HEILAGA
BÍBLIA

FØROYSKA KING JAMES

INNIHALDANDI HITT GAMLA
OG HITT NÝGGJA TESTAMENTI,

TÝDD EFTIR KING JAMES BÍBLIUNI, A.V. 1611,

SAMANBERING OG RÁÐFØRING VIÐ, OG TILSTUÐLAN AT,
UPPRUNALIGU LUTHERS HEILIGE SCHRIFT FRÁ 1545,
DONSKU KONG CHRISTIANS VI. BÍBLIUNI FRÁ 1740,
ÍSLENDSKU GUÐBRANDS BÍBLIUNI FRÁ 1584,
UMFRAMT HÍNUM FØROYSKU BÍBLIUNUM.



CUM PRIVILEGIO.



HEILAGA BÍBLIA

FØROYSKA KING JAMES

Týðarin gevur ikki loyvi til at broyta orðˇ, stavseting, teknseting, ella nakaðsumhelst; hvørki nú, eiheldur nakrantíð: má Guð Halgi Andin drepa teg, um tú gert (Gern. Áp. 5:5).

(Henda ávaring skal standa orðarætt í øllum útgávum av FKJ).

Hetta er ein trúføst, samvitskusamlig, orð fyri orð týðing av Authoriseraðu King James Bíbliuni, Cambridge Standard Text.

Ognað endatíðarinnar atsøktum: trúgvum framat deyða.

THANKS TO ALL CHURCHES AND INDIVIDUALS IN AMERICA, WHICH HAVE ON ANY WISE GIVEN OR HOLPEN TOWARD THIS WORK.

Onnur útgáva av N.T., fyrsta útgáva av G.T.,
fyrsta útgáva av allari FKJ,
A.D. 2015.

Prentað hjá Bearing Precious Seed;
Milford, Ohio; Norður Amerika.

TIL HINS MEST HØGA OG MEKTIGA PRINS

JAMES,

VIÐ GUÐS NÁÐI

KONGUR AV STÓRA BRETLANDI, FRAKLANDI, OG ÍRLANDI, VERJI TRÚARINNAR, & SFRV.

Týðarar Bibliunnar ynskja Náði, Miskunn, og Frið, gjøgn JESUS CHRIST váran Harra.

MIKLAR og margfaldar vóru tær signingar, mest øtiligi Stjórnarharri, sum Almáttugi Guð, Faðir alra miskunna, skonkti uppá okkum, *Onglands* fólk, tá ið hann fyrst sendi Persón Tygara Kongligu Hátignar at stjórna og at ríkja yvir okkum. Tí at hvar ið tað var eftirvæntanin hjá mongum, sum ynsktu ikki *Sion* várum væl, at eftir setuna av hasi bjørtu *Vestligu Stjørnu, Elizabeth* Drotningar mest sælu endurminningar, einhvør tjúkk og ítøkilig skýggj skuldu soleiðis havt skuggað yvir hetta Land, at menn skuldu havt verið í iva um hvønn veg teir áttu at ganga; og at tað skuldi treyðugt verðið vitað, hvør átti at leiðbeina tí óstøðaða Statinum; rak birtan Tygara Hátignar, sum *Sólin* í síni styrki, við tað sama burt hasi hugsaðu og innbillaðu dis, og gav øllum, sum vóru væl sinnaðir, avbæra grund til troyst; serliga tá ið vit skoðaðu ta Stjórn, sum varð grundløgd í Tygara Hásemi, og Tygara vónríka Sáð, við einum Titli sum verður ikki ivaður um, og hetta eisini fylgt við friði og ró her heima og burturi.

Men millum allar okkara gleðir var tað eingin, sum fylti okkara hjørtu meira, enn vælsignaða áframhaldið av prædikanini av Guðs heilaga Orði okkara millum; sum er hin ómetiligi dýrgripurin sum ber av øllum ríkidømum jarðarinnar; av tí at ávøksturin av tí strekkir seg, ikki bert til tíðina sum verður brúkt í hesi framviðfarandi verøld, men leiðbeinir og tillagar menn at hini ævigu sælu sum er fyri oman í himni.

So fyri ikki at loyva hesum at falla til jarðarinnar, men heldur at taka tað upp, og at halda áfram í teirri støðu, í hvørji navngitni Fyrirennarin hjá Tygara Hásemi eftirlæt tað: nei, fyri at fara frameftir við treystinum og festuni hjá einum Manni í at varðveita sannleika Christs, og planta hann nær og fjar, er tað sum soleiðis hevur bundið og fastliga knýtt hjørtuni hjá øllum Tygara Hátignar holla og trúrøkna fólki at Tygum, so at sjálvasta Tygara navn er dýrabært teirra millum: teirra eyga skoðar Tygum við uggan, og teir vælsigna Tygum í sínum hjørtum, sum hin halgaða Persón, sum, undir Guði, er beinleiðis Høvundurin at teirra sonnu gleði. Og henda teirra nøgdsemi minkar ikki ella ferst, men hvønn dag veksur og fær styrki, tá ið teir skoða, at vandlætið hjá Tygara Hátign mótvegis Guðs húsi dragnar ikki ella gongur afturá, men verður meiri og meiri kynt, gevandi seg til kennar útiumkring í hinum fjarastu pørtum av *Christindómi,* við skriving í verju av Sannleikanum, (sum hevur givið eitt slíkt høgg til handa syndarinnar mann, sum vil ikki verða grøtt,) og hvønn dag her heima, við trúrøknari og lærdari talu, við tíðugt at vitja

Guðs hús, við at hoyra Orðið prædikað, við at virðismeta Frálærarar tess, við at hava umsorgan fyri Kirkjuni, sum ein mest eymligur og elskandi hjúklandi Faðir.

Tað finnast óendaligar próvgrundir fyri hesi røttu Christnu og trúrøknu yndan í Tygara Hátign; men eingin er meiri kraftsom til at kunngera tað til annara enn hin yvirhugaða og viðvarandi tráan eftir at fullføra og útgeva hetta verk, sum vit nú við allari eyðmjúksemi framseta at Tygara Hátign. Tí at tá ið Tygara Hásemi einaferð úr djúpari døming høvdu fatað, hvussu hóskiligt tað var, at úr hinum Upprunaligu Heilagu Tungumálunum, tilsaman við at samanbera arbeiðini, bæði í okkar egna, og øðrum Tungumálum, av mongum verdigum monnum sum fóru undan okkum, skuldi tað verða ein meiri røtt Týðing av heilagum Skriftum til hina *Ensku Tungu;* lótu Tygara Hátign ikki vera við at tilskunda og at tileggja teir, til hvørja tað var litið, at arbeiðið mátti verða skundað, og at gerningurin mátti verða intur á ein so sømiligan hátt, sum eitt mál av slíkum týdningi av røttum mátti kravt.

Og nú endiliga, við Guðs miskunn, og áframhaldinum av várum strevum, tað verandi ført fram at eini slíkari niðurløgu sum til at vit hava miklar vónir um, at *Onglands* Kirkja skal heysta góðan ávøkst av tí; halda vit tað vera okkara skylda at lata tað til Tygara Hátign, ikki einans sum okkara Kongi og Stjórnarharra, men sum til høvuðs Drívmegi og Upphavsmann at arbeiðinum: eyðmjúkiligani tráandi av Tygara mest Heilagu Hátign, at við tað at ting av hesi góðsku hava altíð verðið útsett fyri atfinning av illmeinandi og misnøgdum persónum, tað má fáa samtykki og verju frá so lærdum og skynsomum Prinsi sum Tygara Hásemi eru, hvørs loyving og góðtaking av várum strevum skal meiri heiðra og tilstuðla okkum, enn allar ákæringar og hørðu týðingar annara manna skulu ógva okkum. So at um, á teirri ēinu síðuni, vit skulu verða baktalaðir av Pávaligum Persónum her heima ella burturi, sum tí vilja útspilla okkum, av tí at vit vóru neyðars amboð at fáa Guðs heilaga Sannleika at verða enn meir og meir kendan hjá fólkinum, hvørji teir tráa enn at halda í vankunnu og myrkri; ella um, á hīnari síðuni, vit skulu verða útspiltir av sjálvsinnbillandi Brøðrum, sum renna sínar egnu vegir, og veita dáming at ongum, uttan tí sum er myndað av teimum sjálvum, og smíðað á teirra ambolti; vit mega hvíla tryggir, stuðlaðir innvortis av sannleikanum og sakloysinum av eini góðari samvitsku, havandi gingið einfaldleikans og heilseminnar vegir, sum frammi fyri Harranum; og uppihildnir útvortis við kraftfullu verjuni av náði og góðtokka Tygara Hátignar, sum vil altíð geva ásjón til ærlig og Christin strev ímóti beiskum atfinningum og óvælvildarsomum tilskrivingum.

Harri himins og jarðar vælsigni Tygara Hátign við mongum og sælum døgum, so at, eins og hans himinska hond hevur uppríkað Tygara Hásemi við mongum serstøkum og serligum náðum, Tygum soleiðis mega vera undran heimsins í hesi seinnu tíð um gleði og sanna sælu, til heiðurs hins mikla GUÐS, og til góðar hjá hansara Kirkju, gjøgn Jesus Christ váran Harra og einasta Frelsara.

NØVNINI OG RAÐFYLGJAN
Á ØLLUM BÓKUM
HINS GAMLA OG NÝGGJA TESTAMENTIS,
VIÐ TALI TEIRRA KAPITLA.

Bøkur Hins Gamla Testamentis.

	Síða	*Kap.*
GENESIS	1	50
Exodus	71	40
Leviticus	129	27
Nummur	173	36
Devteronomion	234	34
Josjua	285	24
Dómararnir	319	21
Ruth	353	4
I. Sámuel	357	31
II. Sámuel	402	24
I. Kongabók	440	22
II. Kongabók	484	25
I. Krýnikubók	526	29
II. Krýnikubók	566	36
Ezra	614	10
Nehemiah	627	13
Esther	647	10
Job	657	42
Psálmarnir	693	150
Orðtøkini	781	31
Prædikarin	812	12
Hásongur Sálomons	822	8
Esaiah	828	66
Jeremiah	895	52
Harmljóðini	971	5
Ezekiel	978	48
Dániel	1047	12
Hósea	1068	14
Jóel	1078	3
Amos	1081	9
Obadiah	1089	1
Jónah	1090	4
Micah	1093	7
Náhum	1099	3
Hábakkuk	1101	3
Zephanjah	1104	3
Haggai	1107	2
Zecharjah	1109	14
Malachi	1120	4

Bøkur Hins Nýggja Testamentis.

	Síða	*Kap.*
MATTHÆUS	1	28
Markus	46	16
Lukas	74	24
Jóhannes	123	21
Gerningar Ápostl.	158	28
Rómverjar	205	16
I. Corintharar	223	16
II. Corintharar	241	13
Galatarar	253	6
Ephesarar	259	6
Philippensarar	265	4
Colossensarar	270	4
I. Thessalonicarar	274	5
II. Thessalonicarar	277	3
I. Timotheus	280	6
II. Timotheus	285	4
Titus	288	3
Philemon	290	1
Hebrearar	291	13
Jákob	305	5
I. Pætur	309	5
II. Pætur	314	3
I. Jóhannes	318	5
II. Jóhannes	322	1
III. Jóhannes	323	1
Judas	324	1
Opinbering Jóhannesar	325	22

TORFØR ORÐ, LÁNORÐ, OG NÝGGJ ORÐ

aftan : kvøld
afturkastiligur : (for)kastiligur
afturrekingur : ein, sum verður rikin aftur, av tí at hann stendst ikki prógvið
alveg[is] : allan veg (líkt altíð)
at : allan vegin at, innat; til, ella yvirfyri. Brúkt sum fyriseting í hvørjumfalli, t.d., Hann bygdi eitt altar at HARRANUM, t.e. hann bygdi HARRANUM altar
ábjóða : bjóða, (smb. áleggja)
ágirnd[arsemi] : havisjúka
beggja : hjá / av báðum
ámilli : ámillum, ímilli
ástbrelni : brelni eftir ást
ávinningur : ágóði, vinningur
berka : gera beran
dramblæti : stoltleiki
dugnaður / dugnan : hjálp
dvølja : steðga stytri skeið, bíða
dvøljast : steðga longri skeið, búgva
dýrgoyma : goyma dýrabæran
dýrðmeta : meta dýrdligan
domisøga : liknilsi
einkið : einki
Eliseus : Grikska Ný-Testamentliga navn E-li´-sja
endurbøta : gera aftur í stand
endursóna : gera aftur sátt
fimla : fjamska
firra : flyta burt; reka burt
fljótliga : skjótliga, snarliga
forðast : halda sær frá & frá sær
formana : leggja gott niðurí við áminning
fyribúgva : frammanundan búgva til, fyrireika
fyribøting : gerð av bót fyri e.h., (propitiatión)
fyrifram : frammanundan
fyrihyggja : at íhuga fyrifram
fyrisiggja : at síggja fyrifram
fyritilætla : frammanundan ætla til, (predestinera)
fyriætla : frammanundan ætla
framganga : ganga fram, økjast
framhjá : framvið
frástoyta : gera uppreist (ímóti harradømi)
frælsligur : opinhjartaður, gávumildur
fyriskriva : avgera við forskrift
galeiða : róðrarskúta við segli
Guðhøvdið : tríeindin
góðsemi : góðska
gravhýsi : grøv við duri, høgd inn í klett
Guðslæra : læra um Guð
gæta : passa, røkja, vera um
haðanífrá : frá teirri *tíð* fram
haðani frá : frá tí *staði* fram
hagarmót : hagar ímót, hagar
harat : har at, at tí, til tess
harav : av tí, hjá tí, tess, útfrá tí
hará : á hann / hana / tað
harfyri : tessvegna, tí
harhjá : hjá honum / henni / tí
harinn : har inn
harum : um hann / hana / tað
harmavreiði : harmslig vreiði
hálátigur : ein sum letst háur
hásemi : hvussu høgur ein er
heilsemi : integritetur
heldøming : døming til æviga glatan í helviti (en: damnation)
heltikin : settur av djevli
hendi [Guðs] : hond [Guðs]
herí : her í, í hesum
herat : at hesum
herav : her av, av / hjá hesum
hesa[ra] : hjá / av hesum
hesar[ar] : hjá / av hesari
hiðanífrá : frá hesi *tíð* fram
hiðani frá : frá hesum *staði* fram
hinna : hjá hinum (hvrsf., fleirt.)
holpið : hjálpt (En. holpen, Ísl. holpið)
horva : venda, líta
húss : hvørsfall av hús, t.d. dýrgripir HARRANS húss; sum húsar; (berist fram sum hús)
hvar[fram]at : [fram]at hvørjum
hvará : hvar á; á hvat, á hvørjum
hvarí : hvar í; í hvat, í hvørjum
hvarum : um hvat
hvarútfrá : út frá hvørjum, við hvat
hvartil : hvar til, til hvat
hvaruppá : uppá hvat
hvaruppiá : uppiá hvørjum
hvarvið : hvar við, við hvørjum
hvatiðso : hvat tað so er
hvønn : [hann] sum
hvøriðenn : hvør tað enn er
hvøriðso : hvør tað so er
hvørja [mans] : hjá hvørjum [manni]; t.e., hjá tí manni
hvørsháttar : hvussu e.h. er háttað; av hvørjum slagi tað er
hvørsumhelst : hvør sum helst
hvørsvegna : av hvørji grund
hvørjir : [teir] sum
hvørjar : [tær] sum (í hvnf.)
hvørt : [tað] sum; ella um
hvør : [hann / hon] sum; sum[P]
hvørjum : [teim] sum
hyggiglar : skoðiglar, spegil
innfara : fara inn [í]
innganga : ganga inn [í]
íhuga : hugsa um djúpliga
írista : gravera
karafla : fløska
klárleggja : gera klárt við frágreiðing
kringfara : fara kring um
kvølja : útinna kvøl inná; níva
lærusveinka : kvenkyns lærusveinur
maður : (1) kallmaður, (2) kvennmaður; menniskja
máttur : makt, vald, kraft
mikin : miklan (hvønnfall)
okfelagi : felagi undir sama oki
orakkul : orð frá Guði; ella halgidómur
oyða : reyn; tó ikki oyðimørk
ó[fram]sigiligt : sum ei kann sigast
ósiganligt : sum ei kann sigast
ósærstýrligur : ein sum hevur ikki lyndi til at stýra sær
rist mynd : avgudur, høggmynd
ríkja : ráða, tó vísandi til kongs
sannvísa : vísa at e.h. er satt
skilningur : skil, fatan
skírga : gera reint tvørturígjøgn
skírur : reinur tvørturígjøgn
skreytseyma : brodera
ský : himinhválv, loft
skøkjugera : gera til skøkju
sláturoffur : offur sum verður slátrað
slúrur : drongur
smástavur : hin minsti Hebraiski bókstavur; ein jota
sneytidólgur : forvitin sneytari
spyrjast : spyrja hvør annan
staðnum : plássinum
staðinum : býinum
stórgera : gera stóran, hámeta
stavkrókur : hin minsti krókur á Hebraiskum bókstavi; ein títtil
stúranarfullsemi : fullsemi av stúran
sútfullsemi : fullsemi av súti
sævar : sjóvar, havs
tabernakkul : tjaldhalgidómur, tjaldbúð
telja : (1) siga frá; (2) telja tøl
tenja : strekkja
tessháttar : tílíkt, soleiðis háttað
tilsaman : saman
trísinnis : tríggjar ferðir
treða : traðka, troða
trærreisur : tríggjar ferðir
tvá : hvønnfallsháttur av tvey
tveggja : hjá / av tveimum
tvísinnis : tvær ferðir
tvó : tváaði
tværreisur : tvær ferðir
umberni : lyndi til at umbera
umbiðja : biðja um, (tó ikki bøn)
umleyp : G.T. páskirnar, har Guð *leyp um* blóð-áslett hús
úrvals : tað besta í e.h. úrvali
varðandi : viðvíkjandi
vega, [vegur, vá / vó, vógu, vigin] : drepa
veri : veri [seg]; (hugsandi mál)
verða gjørt : at henda, tó so at persónur útinnir hendingina
virðingarótti : óttalig virðing
við^ : tá ið týdningurin er *við brúki av, við hjálp av,* ella *við síðuna av;* ikki *saman við*. Sum *ved* á donskum
vondur : fullur í óndskapi
vælvild : ósjálviskur kærleiki
vær : vit, tó um fleiri enn tveir persónar, (pluralis, ikki dualis)
yvirí : yvir í, í, til
[um] ævirmeir : til æviga [tíð]

EIN FRÁGREIÐING UM HINAR SERLIGU MÁLSLIGU REGLUR HESARAR BÓKAR.

AV tí at Hin Heilaga Bíblia er ein gomul bók, og vegna tess at King James Bíblian, (sum er frá 1611), so hóskiligani er skrivað á kongligum tignarmáli, talar eisini Hin Føroyska King James á einum upphevjaðum máli. Fyri at náa hesum tignarmáli, stýra *til, millum,* og *innan* sum oftast hvørsfalli. Eisini eru serligir málsligir hættir, sum finnast í King James Bíbliuni, vorðnir læntir úr Íslendskum, (sum jú er eitt sera væl varðveitt mál av okkara felags Norrønu rót), og síðan vorðnir tillagaðir til Føroyskt mál.

Tríggir serligir málsligir hættir eru í King James Holy Bible; teir eru: *hugsandi háttur, ynskisháttur, og ókomin tíð*. Teir báðir fyrstu hátta sær soleiðis í FKJ, at sagnorðið tá tekur tann formin tað hevur í fyrsta persóni eintali; tað fær tó ikki umljóð, uttan tað longu er kent soleiðis í Føroyskum. Dømi um hugsandi hátt er, *Um nakar maður hoyri rødd mína, og opni dyrnar;* (Opb. 3:20). Hoyrir verður til hoyri, og opnar verður til opni. Annað dømi er, *Tessvegna, um nakar maður veri í Christi;* (II. Cor. 5:17). Er verður til *veri,* sum er enn kent í talumáli sum *veri seg,* tað er, at man setur sær nakað fyri í huganum: man tosar *hugsandi*. Eitt dømi um ókomna tíð er, *Sýna tit deyða Harrans til hann komi;* (I. Cor. 11:26). Kemur verður til komi. Ynskisháttur er kendur í Føroyskum; til dømis, Guð *gævi;* væl *gagnist, læri* tú væl, osv., hetta er vorðið víðkað í FKJ til at umfata alla ynskistalu, tó sum oftast við ongum umljóði.

Sagnorð í øðrum persóni eintali, sum í nútíðar máli hava líka *ur* ending í øðrum og triðja persóni eintali, hava øll fingið *t* ella *rt* skoytt uppí endan í FKJ, bæði í nútíð og í tátíð, hetta fyri at gera sjónligan tann neyðuga munin á sagnorðum í øðrum og triðja persóni eintali, og harvið náa fram til ein fult sundurgreinaðan málbúna, sum er førur fyri at bera tignarmál King James Bíbliunnar. Dømi, *Hvar tú hevurt lagt hann;* (Jóh. 20:15); altso, hann *hevur,* men tú *hevurt*. Hetta er neyðugt, av tí at orðið *tú* stendur ikki altíð í tekstinum.

Teknseting FKJ Bíbliunnar er sín egin; hon er í útgangsstøðinum heilt eins og teknseting Ensku KJB, har teknini , ; : og . eru sett sum stigvísar sundurdeilingar av mangan longu setningum Bíbliunnar. Eyka komma og semikolon eru varisligani vorðin sett inn í FKJ, men punktum og kolon eru sett sum í KJB.

Kolon er ikki brúkt í sambandi við framsagnir, eiheldur gásareygu; fyri at minna á, at Bíblian er ikki jarðisk: hon er Guðs heilaga orð.

Heilaga Bíblia, Føroyska King James, er okkara fýra hundrað ár seinkaða reformatións Bíblia, loksins øll hini varðveittu orð Guðs á hini Føroysku tungu: ja, enntá øll hini skírgaðu orð HARRANS.

> Orðini hjá HARRANUM *eru* skír ord˘: *sum* silvur roynd í einum bræðsluovni av jørð, skírgaði sjey ferðir.
> Tú skalt varða tey, O HARRI, tú skalt varðveita tey frá hesi ætt um ævir. (Psálmur 12:6-7).

TEKN SUM ERU BRÚKT Í HESI BÓK.

Í hesi bók eru orðini, hjá hvørjum úttalan er uppmerkt, deild upp í stavilsir við stuttum bindistrikum (·). Tað stavilsi, sum mesta áherðsla eigur at verða løgd á, er merkt (´). Í samansettum nøvnum verða tvey (´) mangan innførd. Tann longra bindistrikan (-) vísir á sundurdeilingina í partar av samansettum nøvnum, so víst tað er uppmerkt í Authoriseraðu King James Bíbliuni.

ā : sum í Asia
â : -- ″ -- familjur
ă : -- ″ -- lamb
āa : -- ″ -- lamadýr
a͡e : a, t.d. Jeph´·tha͡e
a͡i : ei, sum í eisini
a͟i : ey, sum í reyn
a͡u : sunnanmáls ó
āu : a, og so u
c : k, t.d. Sá´·doc
ç : s, t.d. Çæsar
c͟h : k, t.d. Á´·c͟haz
ē : sum í mega
ê : -- ″ -- bera
ĕ : -- ″ -- lenda
ēe : -- ″ -- lena
e͡e : tvey e
e͡i : sunnanmáls ei
e͡u : u, sum í lutur
e͟u : norðanmáls ó
ī : sum í tiðna
î : -- ″ -- minna
ĭ : -- ″ -- lind
ō : -- ″ -- forða
ô : -- ″ -- lond
ŏ : -- ″ -- lodd
o͡i : sum í oyra
o͡e : langt o, t.d. alo͡e
p͟h : f, t.d. P͟hariseari
ph : p, t.d. Phut
p͟s : s, t.d. p͟sálmur
th : t, t.d. Thess·a·lo´·ni·ca
ū : sum í bruni
û : -- ″ -- um
ŭ : -- ″ -- pund
æ : -- ″ -- ferðast
ȳ : -- ″ -- smyril
ŷ : -- ″ -- mynna
ў : -- ″ -- mynd
við^ : sum *ved* á donskum
við• : viður, træ, timbur
ēin : talorð, ikki kenniorð
hĭn : hin, ikki hesin
hĭtt : hitt, ikki hetta
hjá˝ : í sama týdningi sum *við*
ˇ : fleirtal; t.d. svørðˇ, húsˇ
˜ : bundið; t.d. Tú ert C͟hristus˜
ᵖ : um persón, ikki ting; frámerkt har neyðugt
xe : se, t.d. Ăr·tă·xĕrx´·ēs
¶ : nýtt stykki

HIN FYRSTA BÓK MÓSESAR,
KALLAÐ
GENESIS.

KAPITUL 1

Í BYRJANINI skapaði Guð himinin og jørðina.
2 Og jørðin var uttan form, og tóm; og myrkur *var* uppiá ásjónini á djúpinum. Og Guðs Andi rørdist uppiá ásjónini á vøtnunum.
3 Og Guð segði, Veri ljós: og tað varð ljós.
4 Og Guð sá ljósið, at *tað var* gott: og Guð skildi ljósið frá myrkrinum.
5 Og Guð kallaði ljósið Dag, og myrkrið kallaði hann Nátt. Og kvøldið og morgunin vórðu hin fyrsta dagin.
6 ¶ Og Guð segði, Veri hválv í miðjum vøtnunum, og lat tað skilja vøtnini frá vøtnunum.
7 Og Guð gjørdi hválvið, og skildi vøtnini sum *vóru* undir hválvinum, frá vøtnunum sum *vóru* uppiyvir hválvinum: og tað varð so.
8 Og Guð kallaði hválvið Himin. Og kvøldið og morgunin vórðu hin annan dagin.
9 ¶ Og Guð segði, Vøtnini undir himninum verði savnaði saman at ẽinum staði, og lat tað turra *landið* birtast: og tað varð so.
10 Og Guð kallaði tað turra *landið* Jørð; og savningina saman av vøtnunum kallaði hann Høv: og Guð sá, at *tað var* gott.
11 Og Guð segði, Jørðin beri fram gras, urtina veitandi fræ, *og* ávakstartræið veitandi ávøkst eftir slagi sínum, hvørs fræ *er* í tí sjálvum, uppiá jørðini: og tað varð so.
12 Og jørðin bar fram gras, *og* urt veitandi fræ eftir sínum slagi, og træið veitandi ávøkst, hvørs fræ *var* í tí sjálvum, eftir slagi sínum: og Guð sá, at *tað var* gott.
13 Og kvøldið og morgunin vórðu hin triðja dagin.
14 ¶ Og Guð segði, Veri ljós í himinhválvinum til at skilja dagin frá náttini; og veri tey til tekin, og til tíðir, og til dagar, og ár:
15 Og veri tey til ljós í himinhválvinum til at geva ljós uppá jørðina: og tað varð so.
16 Og Guð gjørdi tvey mikil ljós; hitt miklara ljósið til at stjórna deginum, og hitt minna ljósið til at stjórna náttini: *hann gjørdi* stjørnurnar eisini.
17 Og Guð setti tey í himinhválvið til at geva ljós uppá jørðina,
18 Og til at ráða yvir deginum og yvir náttini, og til at skilja ljósið frá myrkrinum: og Guð sá, at *tað var* gott.
19 Og kvøldið og morgunin vórðu hin fjórða dagin.
20 Og Guð segði, Vøtnini beri fram ríkiligani hina rørandi skepnu sum hevur lív, og fugl *sum* kann flúgva uppiyvir jørðini í tí opna himinhválvinum.
21 Og Guð skapti miklar hvalir, og hvørja livandi skepnu sum rørist, hvørjar vøtnini bóru fram ríkiliga, eftir slagi teirra, og hvønn veingjaðan fugl eftir slagi sínum: og Guð sá, at *tað var* gott.
22 Og Guð vælsignaði tey, *og* segði, Verið ávakstasom, og fjølgist, og fyllið vøtnini í høvunum, og fjølgist fuglur á jørðini.
23 Og kvøldið og morgunin vórðu hin fimta dagin.
24 ¶ Og Guð segði, Jørðin beri fram hina livandi skepnu eftir slagi sínum, fenað, og skriðkykt, og villdjór jarðarinnar eftir slagi sínum: og tað varð so.

25 Og Guð gjørdi villdjór jarðarinnar eftir slagi tess; og fenað eftir slagi teirra; og alt, sum skríður uppiá jørðini, eftir slagi sínum: og Guð sá, at *tað var* gott.

26 ¶ Og Guð segði, Latum oss gera mann í vári mynd, eftir líkleika várum: og lat teir hava harradømi yvir fiski havsins, og yvir fugli luftarinnar, og yvir fenaðinum, og yvir allari jørðini, og yvir hvørjum skriðkykti sum skríður uppiá jørðini.

27 So Guð skapti mann í síni *egnu* mynd, í Guðs mynd skapti hann hann; kallkyn og kvennkyn skapti hann tey.

28 Og Guð vælsignaði tey, og Guð segði við tey, Verið ávakstasom, og fjølgist, og uppfyllið jørðina, og undirleggið hana: og havið harradømi yvir fiski havsins, og yvir fugli luftarinnar, og yvir hvørjum livandi tingi sum rørist uppiá jørðini.

29 ¶ Og Guð segði, Sí, eg havi givið tykkum hvørja urt, berandi fræ, sum *er* uppiá ásjónini á allari jørðini, og hvørt træ, í hvørjum *er* ávøksturin hjá træi, veitandi fræ; til tykkara skal tað vera til matnað.

30 Og til hvørt villdjór jarðarinnar, og til hvønn fugl luftarinnar, og til hvørt ting sum skríður uppiá jørðini, í hvørjum *er* lív, *havi eg givið* hvørja grøna urt til matnað: og tað varð so.

31 Og Guð sá hvørt ting sum hann hevði gjørt, og sí, *tað var* sera gott. Og kvøldið og morgunin vórðu hin sætta dagin.

KAPITUL 2

SVÁ vórðu himnarnir og jørðin fullførd, og alt teirra herlið.

2 Og á hinum sjeynda degi endaði Guð sítt verk sum hann hevði gjørt; og hann hvíldi á hinum sjeynda degi frá øllum sínum verki sum hann hevði gjørt.

3 Og Guð vælsignaði hin sjeynda dagin, og halgaði hann: av tí at í honum hevði hann hvílt frá øllum sínum verki sum Guð skapti og gjørdi.

4 ¶ Hetta *eru* upprunatalvur himnanna og jarðarinnar, tá ið tey vórðu skapað, á tí degi sum HARRIN Guð gjørdi jørðina og himnarnar,

5 Og hvørja plantu akursins, áðrenn hon var á jørðini; og hvørja urt akursins, áðrenn hon vaks: tí at HARRIN Guð hevði ikki elvt tí at regna uppá jørðina, og *tað var* ikki maður at pløga lendið.

6 Men tað gekk upp eitt dis frá jørðini, og vatnaði alla ásjónina á lendinum.

7 Og HARRIN Guð myndaði mann *av* støvi jarðarinnar, og andaði inn í hansara nasar lívsandan; og maður gjørdist ein livandi sál.

8 ¶ Og HARRIN Guð plantaði ein aldingarð eystanvert í Eden; og har setti hann mannin sum hann hevði myndað.

9 Og burtur úr lendinum fekk HARRIN Guð at vaksa hvørt træ, sum er dámligt fyri sjónini, og gott til matnað; lívsins træ eisini í miðjum aldingarðinum, og træ kunnleikans um gott og ilt.

10 Og ein á gekk út úr Eden til at vatna aldingarðin; og haðani frá varð hon greinað, og gjørdist til fýra áir.

11 Navnið á hini fyrstu *er* Pī´sŏn: tað *er* hon sum umgirðir alt land Há´-vī-lŭh, har *tað finst* gull;

12 Og gullið hjá tí landinum *er* gott: har *er* bdellium og sjóham steinurin.

13 Og navnið á hini aðru ánni *er* Gī´-hŏn: hin sama *er* hon sum umgirðir alt land Ê-thĭ-ō´-pĭ-ŭ.

14 Og navnið á hini triðju ánni *er* Hĭd´-dĕ-kĕl: tað *er* hon sum gongur ímóti eystur*part*inum av Assýriu. Og hin fjórða áin *er* Ĕv-p<u>hr</u>ā´-tēs.

15 Og HARRIN Guð tók mannin, og setti hann inn í aldingarð Edens at røkja hann og at varða hann.

16 Og HARRIN Guð skipaði manninum, sigandi, Av hvørjum træi aldingarðsins kanst tú frælsliga eta:

17 Men av træi kunnleikans um gott og ilt, tú skalt ikki eta av tí: tí at á tí degi sum tú eturt av tí, skalt tú vissuliga doyggja.

18 ¶ Og HARRIN Guð segði, *Tað er* ikki gott, at maðurin skuldi verið einsamallur; eg vil gera honum eina hjálp, hóskilig til hansara.

19 Og burtur úr lendinum myndaði HARRIN Guð hvørt villdjór markarinnar, og hvønn fugl luftarinnar; og førdi *tey* at Adami til at sjá hvat hann vildi kalla tey: og hvatsumhelst *ið* Adam kallaði hvørja livandi skepnu, tað *varð* navnið hará.

20 Og Adam gav nøvn til allan fenað, og til fugl luftarinnar, og til hvørt villdjór markarinnar; men til Adams varð ikki funnin hjálp, hóskilig til hansara.

21 Og HARRIN Guð fekk ein djúpan svøvn at falla uppá Adam, og hann svav: og hann tók eitt av rivjabeinum hansara, og lokaði fyri kjøtið í stað tess;

22 Og rivjabeinið, sum HARRIN Guð hevði tikið frá mann*inum*, gjørdi hann *til* eina kvinnu, og leiddi hana at manninum.

23 Og Adam segði, Hetta *er* nú bein av mínum beinum, og hold av mínum holdi: hon skal verða kallað Kvennmaður, av tí at hon varð tikin út úr Manni.

24 Tí skal ein maður fara frá faðir sínum og móður síni, og skal krøkja *seg* at konu síni: og tey skulu vera ēitt hold.

25 Og tey vóru bæði nakin, maðurin og kona hansara, og skammaðust ikki.

KAPITUL 3

NÚ, høggormurin var sniðfundigari enn nakað djór markarinnar sum HARRIN Guð hevði gjørt. Og hann segði við kvinnuna, Ja, hevur Guð *nú* sagt, Tit skulu ikki eta av hvørjum træi aldingarðsins?

2 Og kvinnan segði við høggormin, Vit mega eta av ávøkstinum av trøum aldingarðsins:

3 Men av ávøkstinum av træinum sum *er* í miðjum aldingarðinum, Guð hevur sagt, Tit skulu ikki eta av tí, eiheldur skulu tit nema við tað, at ikki tit doyggi.

4 Og høggormurin segði við kvinnuna, Tit skulu ikki vissuliga doyggja:

5 Tí at Guð veit, at á tí degi tit eta harav, tá skulu eygu tykkara verða upplatin, og tit skulu verða sum gudar, skynandi á góðum og illum.

6 Og tá ið kvinnan sá, at træið *var* gott til matnað, og at tað *var* dámligt fyri eygunum, og eitt træ at verða tráað *til* at gera *ein* vísan, tók hon av ávøkstinum harav, og át, og gav eisini manni sínum hjá sær; og hann át.

7 Og eyguni hjá teimum báðum vórðu upplatin, og tey vitstu at tey *vóru* nakin; og tey seymaðu fikubløð saman, og gjørdu sær fyriklæðir.

8 Og tey hoyrdu rødd HARRANS Guðs, gangandi í aldingarðinum í svala dagsins: og Adam og kona hansara fjaldu seg frá nærveru HARRANS Guðs millum træa aldingarðsins.

9 Og HARRIN Guð kallaði at Adami, og segði við hann, Hvar *ert* tú?

10 Og hann segði, Eg hoyrdi rødd tína í aldingarðinum, og eg varð ræddur, av tí at eg *var* nakin; og eg fjaldi meg.

11 Og hann segði, Hvør segði tær, at tú *vart* nakin? Hevurt tú etið av træinum, hvarav eg skipaði tær, at tú skuldirt ikki eta?
12 Og maðurin segði, Kvinnan, sum tú gavst *at vera* hjá mær, hon gav mær av træinum, og eg át.
13 Og HARRIN Guð segði við kvinnuna, Hvat *er* hetta, *sum* tú hevurt gjørt? Og kvinnan segði, Høggormurin tøldi meg, og eg át.
14 Og HARRIN Guð segði við høggormin, Av tí at tú hevurt gjørt hetta, *ert* tú bannaður uppum allan fenað, og uppum hvørt djór markarinnar; uppiá tínum búki skalt tú fara, og støv skalt tú eta allar dagar lívs tíns:
15 Og eg vil seta figgindskap ímillum teg og kvinnuna, og ímillum sáð títt og sáð hennara; tað skal meiðsla høvur títt, og tú skalt meiðsla hæl hansara.
16 Við kvinnuna segði hann, Eg vil stórliga margfalda tína sorg og tína framaling; í sorg skalt tú bera fram børn; og tín trá *skal vera* til ektamans tíns, og hann skal stjórna yvir tær.
17 Og við Adam segði hann, Av tí at tú hevurt givið gætur at røddini hjá konu tíni, og hevurt etið av træinum, av hvørjum eg skipaði tær, sigandi, Tú skalt ikki eta av tí: bannað *er* lendið fyri tína skyld; í sorg skalt tú eta *av* tí allar dagar lívs tíns;
18 Tornir eisini og tistlar skal tað bera fram til tín; og tú skalt eta urt markarinnar;
19 Í sveitta andlits tíns skalt tú eta breyð, til tú vendi aftur at lendinum; tí at burtur úr tí varðst tú tikin: tí at støv tú *ert,* og at støvi skalt tú venda aftur.
20 Og Adam kallaði navnið hjá konu síni Eva; av tí at hon varð móðirin at øllum *sum* liva.
21 Adami eisini og til konu hansara gjørdi HARRIN Guð kyrtlar av skinnum, og klæddi tey.
22 ¶ Og HARRIN Guð segði, Sí, maðurin er vorðin sum ein av okkum, til at skyna á góðum og illum: og nú, bara ikki hann rætti út sína hond, og taki eisini av lívsins træi, og eti, og livi um ævir:
23 Tí sendi HARRIN Guð hann fram frá aldingarði Edens, at pløga lendið, hvaðani frá hann var tikin.
24 So hann rak út mannin; og hann setti eystanfyri Edens aldingarð Cher-ú-bim-ar, og eitt loggandi svørð sum snaraði hvønn *ein* veg, at varða veg lívstræsins.

KAPITUL 4

OG Adam kendi Evu, konu sína; og hon ól fram, og føddi Cáin, og segði, Eg havi fingið man*barn* frá HARRANUM.
2 Og hon aftur føddi hansara bróður Ábel. Og Ábel var ein passari av seyði, men Cáin var ein pløgari av jørðini.
3 Og í framlíðing tíðarinnar bar tað á, at Cáin førdi av ávøksti jarðarinnar eitt offur at HARRANUM.
4 Og Ábel, hann eisini førdi av hinum fyrstuføddu av sínum smáfæafylgi og av fitini harav. Og HARRIN hevði metan yvirfyri Ábel og fyri ofri hans:
5 Men yvirfyri Cáin og fyri ofri hans hevði hann ikki metan. Og Cáin varð ógvuliga vreiður, og hans andlitsbrá fell.
6 Og HARRIN segði við Cáin, Hví ert tú vreiður? og hví er títt andlitsbrá fallið?
7 Um tú gert væl, skalt tú ikki verða góðtikin? og um tú gert ikki væl, liggur synd við hurðina. Og innat tær *skal vera* trá hans, og tú skalt stjórna yvir honum.
8 Og Cáin talaði við Ábel, bróður sín: og tað bar á, tá ið teir vóru í akrinum, at Cáin reis upp ímóti Ábeli, bróður sínum, og vó hann.

9 ¶ Og HARRIN segði við Cáin, Hvar *er* Ábel, bróðir tín? Og hann segði, Eg veit ikki: *Eri* eg passari bróðurs míns?

10 Og hann segði, Hvat hevurt tú gjørt? røddin á blóði bróðurs tíns rópar á meg frá jørðini.

11 Og nú *ert* tú bannaður frá jørðini, sum hevur upplatið sín munn til at taka ímóti blóði bróðurs tíns av tíni hond;

12 Tá ið tú pløgirt lendið, skal tað ikki hiðanífrá veita tær styrki sína; ein flóttamaður og ein flakkari skal tú vera á jørðini.

13 Og Cáin segði við HARRAN, Mín revsing *er* størri enn eg kann bera.

14 Sí, tú hevurt rikið meg út henda dag frá ásjón jarðarinnar; og frá tínum andliti skal eg vera fjaldur; og eg skal vera ein flóttamaður og ein flakkari á jørðini; og tað skal bera á, *at* hvør tann, sum finnur meg, skal vega meg.

15 Og HARRIN segði við hann, Tessvegna, hvørsumhelst *ið* vegur Cáin, hevnd skal verða tikin á hann sjeyfalt. Og HARRIN setti eitt merki uppá Cáin, at ikki nakar, *sum* fann hann, skuldi drepa hann.

16 ¶ Og Cáin fór út frá nærveru HARRANS, og búði í landi Nôds, eystanfyri Eden.

17 Og Cáin kendi konu sína; og hon ól fram, og føddi Ē′-nōch: og hann bygdi ein stað, og kallaði navnið á staðinum eftir navni sonar síns, Ē′-nōch.

18 Og Ē′-nōch-i varð føddur Ĭ′-răd: og Ĭ′-răd gat Mē-hū′-jă-ĕl: og Mē-hū′-jă-ĕl gat Mē-thū′-să-ĕl: og Mē-thū′-să-ĕl gat Lá′-mĕch.

19 ¶ Og Lá′-mĕch tók sær tvær konur: navnið hjá tí ēinu *var* Ā′-dăh, og navnið hjá hīnari Zillah.

20 Og Ā′-dăh føddi Já′-băl: hann varð faðirin at slíkum sum búgva í tjøldum, og *at slíkum sum hava* fenað.

21 Og navnið hjá bróður hansara *var* Jū′-băl: hann varð faðirin at øllum slíkum sum handfara hørpuna og ljóðpípu*na*.

22 Og Zillah, hon eisini føddi Tū′-băl-cáĭn, ein leiðbeinari hjá hvørjum listskapara í messing og jarni: og systir Tū′-băl-cáĭn-s *var* Ná′-ă-măh.

23 Og Lá′-mĕch segði við konur sínar, Ā′-dăh og Zilluh, Hoyrið rødd mína; tit konur Lá′-mĕch-s, lýðið á talu mína: tí at eg havi vigið ein mann til mína særing, og ein ungan mann til skaða mín.

24 Um Cáin skal verða hevndur sjeyfalt, sanniliga Lá′-mĕch sjeyti og sjeyfalt.

25 ¶ Og Adam kendi konu sína aftur; og hon føddi ein son, og kallaði navn hansara Seth: Tí at Guð, *segði hon,* hevur ásett mær eitt annað sáð ístaðin fyri Ábel, hvønn Cáin vá.

26 Og til Seths, til hansara eisini varð tað føddur ein sonur; og hann kallaði navn hansara Ē′-nōs: tá byrjaðu menn at kalla uppá navn HARRANS.

KAPITUL 5

HETTA *er* bók Adams ætta. Á tí degi sum Guð skapti mann, í líkleika Guðs gjørdi hann hann;

2 Kallkyn og kvennkyn skapti hann tey; og vælsignaði tey, og kallaði navn teirra Adam, á tí degi tá tey vórðu skapað.

3 ¶ Og Adam livdi eitt hundrað og tríati ár, og gat *son* í sínum egna líkleika, eftir síni mynd; og kallaði navn hansara Seth:

4 Og dagar Adams, eftir *at* hann hevði gitið Seth, vórðu átta hundrað ár: og hann gat synir og døtur:

5 Og allir dagarnir, sum Adam livdi, vórðu níggju hundrað og tríati ár: og hann doyði.

6 Og Seth livdi eitt hundrað og fimm ár, og gat Ē′-nōs:

7 Og Seth livdi, eftir *at* hann gat Ē´nŏs, átta hundrað og sjey ár, og gat synir og døtur:
8 Og allir dagar Seths vórðu níggju hundrað og tólv ár: og hann doyði.
9 ¶ Og Ē´nŏs livdi níti ár, og gat Câ-ī´năn:
10 Og Ē´nŏs livdi, eftir *at* hann gat Câ-ī´năn, átta hundrað og fimtan ár, og gat synir og døtur:
11 Og allir dagarnir hjá Ē´nŏs vórðu níggju hundrað og fimm ár: og hann doyði.
12 ¶ Og Câ-ī´năn livdi sjeyti ár, og gat Mă-hál´-ă-lēēl:
13 Og Câ-ī´năn livdi, eftir *at* hann gat Mă-hál´-ă-lēēl, átta hundrað og fýrati ár, og gat synir og døtur:
14 Og allir dagar Câ-ī´năn-s vórðu níggju hundrað og tíggju ár: og hann doyði.
15 ¶ Og Mă-hál´-ă-lēēl livdi seksti og fimm ár, og gat Já´rĕd:
16 Og Mă-hál´-ă-lēēl livdi, eftir *at* hann gat Já´rĕd, átta hundrað og tríati ár, og gat synir og døtur:
17 Og allir dagar Mă-hál´-ă-lēēl-s vórðu átta hundrað *og* níti og fimm ár: og hann doyði.
18 ¶ Og Já´rĕd livdi eitt hundrað *og* seksti og tvey ár, og hann gat Ē´nŏch:
19 Og Já´rĕd livdi, eftir *at* hann gat Ē´nŏch, átta hundrað ár, og gat synir og døtur:
20 Og allir dagar Já´rĕd-s vórðu níggju hundrað *og* seksti og tvey ár: og hann doyði.
21 ¶ Og Ē´nŏch livdi seksti og fimm ár, og gat Mĕ-thū´-sĕ-lăh:
22 Og Ē´nŏch gekk við Guði, eftir *at* hann gat Mĕ-thū´-sĕ-lăh, trý hundrað ár, og gat synir og døtur:
23 Og allir dagar Ē´nŏch-s vórðu trý hundrað *og* seksti og fimm ár:
24 Og Ē´nŏch gekk við Guði: og hann *var* ikki; tí at Guð tók hann.
25 Og Mĕ-thū´-sĕ-lăh livdi eitt hundrað *og* áttati og sjey ár, og gat Lá´-mĕch:
26 Og Mĕ-thū´-sĕ-lăh livdi, eftir *at* hann gat Lá´-mĕch, sjey hundrað *og* áttati og tvey ár, og gat synir og døtur:
27 Og allir dagar Mĕ-thū´-sĕ-lăh vórðu níggju hundrað *og* seksti og níggju ár: og hann doyði.
28 ¶ Og Lá´-mĕch livdi eitt hundrað *og* áttati og tvey ár, og gat son:
29 Og hann kallaði navn hansara Nóah, sigandi, Hesin *sami* skal troysta okkum viðvíkjandi arbeiði okkara og strevi handa okkara, uppá grund av lendinum sum HARRIN hevur bannað.
30 Og Lá´-mĕch livdi, eftir *at* hann gat Nóah, fimm hundrað *og* níti og fimm ár, og gat synir og døtur:
31 Og allir dagar Lá´-mĕch-s vórðu sjey hundrað *og* sjeyti og sjey ár: og hann doyði.
32 Og Nóah var fimm hundrað ára gamalur: og Nóah gat Sjem, Ham, og Já´-phĕth.

KAPITUL 6

OG tað bar á, tá ið menn byrjaðu at fjølgast á ásjón jarðarinnar, og døtur vórðu føddar teimum,
2 At synir Guðs sóu mannadøtrarnar, at tær *vóru* vakrar; og teir tóku sær konur av øllum sum teir valdu.
3 Og HARRIN segði, Mín andi skal ikki altíð stríðast við mann*in,* tí at hann eisini *er* hold: tó skulu dagar hansara vera eitt hundrað og tjúgu ár.
4 Tað vóru risar á jørðini í teimum døgum; og eisini eftir tað, tá ið synir Guðs komu inn til mannadøtrarnar, og tær føddu *børn* til teirra, hinir somu *gjørdust* mektigir menn sum *vóru* í forðum, navnfremis menn.

5 ¶ Og GUÐ sá, at vondska mans*ins var* mikil á jørðini, og *at* hvør ímyndan av hugsanum hjarta hansara *var* einans ill áframhaldandi.

6 Og tað iðraði HARRAN, at hann hevði gjørt mann á jørðini, og tað harmaði hann í hansara hjarta.

7 Og HARRIN segði, Eg vil oyða mann*in,* sum eg havi skapað, frá ásjón jarðarinnar; bæði mann, og djór, og skriðkyktið, og fuglar luftarinnar; tí tað iðrar meg, at eg havi gjørt tey.

8 Men Nóah fann náði í eygum HARRANS.

9 ¶ Hetta *eru* ættir Nóah: Nóah var ein rættlátur maður *og* fullkomin í ættum sínum, *og* Nóah gekk við Guði.

10 Og Nóah gat tríggjar synir, Sjem, Ham og Já-phēth.

11 Jørðin eisini var spilt frammi fyri Guði, og jørðin var fylt við harðskapi.

12 Og Guð hugdi uppá jørðina, og sí, hon var spilt; tí at alt kjøt hevði spilt sín veg uppiá jørðini.

13 Og Guð segði við Nóah, Endin á øllum kjøti er komin framfyri meg; tí at jørðin er fylt við harðskapi ígjøgnum teir; og sí, eg vil oyða teir við jørðini.

14 ¶ Ger tær eina ørk av gō-phĕr viði; herbergir skalt tú gera í ørkini, og skalt bika hana innan og uttan við biki.

15 Og hetta *er sniðið,* sum tú skalt gera hana *av:* Longdin á ørkini *skal vera* trý hundrað alnir, breiddin á henni fimti alnir, og hæddin á henni tríati alnir.

16 Ein glugga skalt tú gera til ørkina, og til eina alin skalt tú fullføra hann í erva; og hurðina á ørkini skalt tú seta á síðuna á henni; *við* lægra, øðrum, og triðja *loftum* skalt tú gera hana.

17 Og sí, eg, enntá eg, føri eina flóð av vøtnum uppá jørðina, til at oyða alt kjøt, í hvørjum lívsandin *er,* undan himni; *og* hvørt ting, sum *er* á jørðini, skal doyggja.

18 Men við teg vil eg grunda sáttmála mín; og tú skalt koma inn í ørkina, tú, og synir tínir, og kona tín, og konur sona tína við tær.

19 Og av hvørjum livandi tingi av øllum kjøti, tvey av hvørjum *slagi* skalt tú føra inn í ørkina, at halda *tey* á lívi við tær; tey skulu vera kallkyn og kvennkyn.

20 Av fuglum eftir slagi teirra, og av fenaði eftir slagi teirra, av hvørjum skriðkykti jarðarinnar eftir slagi tess, tvey av hvørjum *slagi* skulu koma til tín, at halda *tey* á lívi.

21 Og tak tú til tín av øllum mati sum etin verður, og tú skalt savna *hann* til tín; og hann skal verða til matnað hjá tær, og hjá teimum.

22 Svá gjørdi Nóah; samsvarandi við alt sum Guð ábjóðaði honum, soleiðis gjørdi hann.

KAPITUL 7

OG HARRIN segði við Nóah, Kom tú og alt títt hús inn í ørkina; tí at teg havi eg sæð rættvísan frammi fyri mær í hesi ætt.

2 Av hvørjum reinum djóri skalt tú taka til tín í sjeyum, kallkynið og hansara kvennkyn: og av djórum sum *eru* ikki rein, sum tvey, kallkynið og hansara kvennkyn.

3 Av fuglum eisini av luftini í sjeyum, kallkynið og kvennkynið; til at halda sáði á lívi uppiá ásjónini á allari jørðini.

4 Tí at enn *eru* sjey dagar, og eg vil elva tí at regna uppá jørðina fjøruti dagar og fjøruti nætur; og hvørt livandi evni, sum eg havi gjørt, vil eg oyða oman av ásjón jarðarinnar.

5 Og Nóah gjørdi sambært øllum sum HARRIN beyð honum.

6 Og Nóah *var* seks hundrað ára gamalur, tá ið flóðin av vøtnum var uppiá jørðini.

7 ¶ Og Nóah fór inn, og synir hansara, og kona hansara, og konur sona hansara við honum, inn í ørkina, uppá grund av vøtnunum av flóðini.

8 Av reinum djórum, og av djórum sum *eru* ikki rein, og av fuglum, og av hvørjum tingi sum skríður uppiá jørðini,

9 Fóru tað inn tvey og tvey til Nóah inn í ørkina, kallkynið og kvennkynið, eins og Guð hevði bjóðað Nóah.

10 Og tað bar á aftaná sjey dagar, at vøtnini av flóðini vóru uppiá jørðini.

11 ¶ Í hinum seks hundradasta árinum av lívi Nóah, í hinum øðrum mánaðinum, hinum seytjanda degi mánaðarins, hin sama dagin vórðu allar keldur hins mikla djúps brotnar upp, og gluggar himins vórðu upplatnir.

12 Og regnið var uppiá jørðini fjøruti dagar og fjøruti nætur.

13 Í sjálvum hinum sama deginum innfóru Nóah, og Sjem, og Ham, og Já´-phĕth, synir Nóah, og kona Nóah, og tær tríggjar konur sona hansara við teimum, inn í ørkina;

14 Tey, og hvørt djór eftir sínum slagi, og allur fenaðurin eftir teirra slagi, og hvørt skriðkykt sum skríður uppiá jørðini eftir slagi sínum, og hvør fuglur eftir slagi sínum, hvør fuglur av hvørjum slagi.

15 Og tey fóru inn til Nóah inn í ørkina, tvey og tvey av øllum kjøti, í hvørjum lívsandin *er*.

16 Og tey, sum fóru inn, fóru inn kallkyn og kvennkyn av øllum kjøti, eins og Guð hevði boðið honum: og HARRIN lokaði hann inni.

17 Og flóðin var fjøruti dagar uppiá jørðini; og vøtnini øktust, og bóru uppi ørkina, og hon varð lyft upp uppum jørðina.

18 Og vøtnini høvdu yvirvág, og vórðu økt nógv uppiá jørðini; og ørkin fór uppiá ásjónini á vøtnunum.

19 Og vøtnini høvdu yvirvág framúrligani uppiá jørðini; og allir hinir høgu heyggjar, sum *vóru* undir øllum himninum, vórðu huldir.

20 Fimtan alnir omantil høvdu vøtnini yvirvág; og fjøllini huldust.

21 Og alt kjøt doyði sum rørdist uppiá jørðini, bæði av fugli, og av fenaði, og av djóri; og av hvørjum skriðkykti sum skríður uppiá jørðini, og hvør maður:

22 Alt, í hvørs nasum lívsandin *var,* av øllum sum *var* á turr*lend*inum, doyði.

23 Og hvørt livandi evni varð oytt, sum var uppiá ásjón lendisins, bæði maður, og fenaður, og skriðkyktini, og fuglur himinsins; og tey vórðu oydd frá jørðini: og Nóah einans varð verandi *á lívi,* og tey sum *vóru* við honum í ørkini.

24 Og vøtnini høvdu yvirvág uppiá jørðini eitt hundrað og fimti dagar.

KAPITUL 8

OG Guð mintist Nóah, og hvørt livandi ting, og allan fenaðin sum *var* hjá honum í ørkini: og Guð fekk ein vind at fara yvir jørðina, og vøtnini linkaðu;

2 Keldur eisini djúpsins og gluggar himins vórðu tipt, og regnið frá himni varð hildið aftur;

3 Og vøtnini vendu aftur oman av jørðini støðugt: og við endan á teimum hundrað og fimti døgunum vóru vøtnini lækkaði.

4 Og ørkin hvíldi í tí sjeynda mánaðinum, á hinum seytjanda degi mánaðarins, uppiá Âr´-â-rät-s fjøllum.

5 Og vøtnini minkaðu støðugt

inntil hin tíggjunda mánaðin: í hinum tíggjunda *mánaðinum,* á hinum fyrsta *degi* mánaðarins, vórðu fjallatindarnir sæddir.

6 ¶ Og tað bar á við endan á fjøruti døgum, at Nóah læt upp gluggan á ørkini sum hann hevði gjørt:

7 Og hann sendi fram ein ravn, sum fór út fram og aftur, inntil vøtnini vórðu tornaði upp oman av jørðini.

8 Hann eisini sendi fram eina dúgvu frá sær, til at sjá um vøtnini vóru lækkaði oman av ásjón lendisins;

9 Men dúgvan fann onga hvílu til ilina á fóti sínum, og hon kom aftur til hansara inn í ørkina, tí at vøtnini *vóru* á ásjónini á allari jørðini: tá rætti hann fram sína hond, og tók hana, og dró hana inn til sín inn í ørkina.

10 Og hann steðgaði enn aðrar sjey dagar; og aftur sendi hann fram dúgvuna út úr ørkini;

11 Og dúgvan kom inn til hansara um kvøldið; og sí, í hennara munni *var* eitt olivinblað, slitið av: so Nóah vitsti at vøtnini vóru lækkaði oman av jørðini.

12 Og hann steðgaði enn aðrar sjey dagar; og sendi út dúgvuna; sum vendi ikki aftur til hansara meira.

13 ¶ Og tað bar á í tí seks hundradasta og fyrsta árinum, í hinum fyrsta *mánaðinum,* hinum fyrsta *degi* mánaðarins, *at* vøtnini vóru tornaði upp oman av jørðini: og Nóah tók burtur dekking arkarinnar, og hugdi, og sí, ásjón lendisins var turr.

14 Og í øðrum mánaðinum, á hinum sjey og tjúgunda degi mánaðarins, var jørðin tornað.

15 ¶ Og Guð talaði við Nóah, sigandi,

16 Far fram út úr ørkini, tú, og kona tín, og synir tínir, og konur sona tína við tær.

17 Før út við tær hvørt livandi ting sum *er* hjá tær, av øllum kjøti, *bæði* av fugli, og av fenaði, og av hvørjum skriðkykti sum skríður uppiá jørðini; at tey mega nørast ríkiligani á jørðini, og vera ávakstasom, og margfaldast uppiá jørðini.

18 Og Nóah fór fram, og synir hansara, og kona hansara, og konur sona hansara við honum:

19 Hvørt djór, hvørt skriðkykt, og hvør fuglur, *og* hvatsumhelst *ið* skríður uppiá jørðini, eftir sløgum sínum, fóru fram út úr ørkini.

20 ¶ Og Nóah bygdi eitt altar at HARRANUM; og tók av hvørjum reinum djóri, og av hvørjum reinum fugli, og ofraði brennioffur˘ á altarinum.

21 Og HARRIN kendi søtan royk; og HARRIN segði í hjarta sínum, Eg vil ikki aftur banna jørðina meira fyri mans*ins* skuld; tí at ímyndan hjarta mans *er* ónd frá ungdómi hans; eiheldur vil eg aftur sláa meira alt livandi, eins og eg havi gjørt.

22 Meðan jørðin verður, skal sáðtíð og heyst, og kuldi og hiti, og summar og vetur, og dagur og nátt ikki halda uppat.

KAPITUL 9

OG Guð vælsignaði Nóah og synir hansara, og segði við teir, Verið ávakstasamir, og margfaldist, og fyllið jørðina.

2 Og óttin fyri tykkum og ønskurin fyri tykkum skal vera uppiá hvørjum djóri jarðarinnar, og uppiá hvørjum fugli luftarinnar, uppiá øllum sum rørist *uppiá* jørðini, og uppiá øllum fiskum sævarins; inn í tykkara hond eru tey latin.

3 Hvørt rørandi ting, sum livir, skal vera matur hjá tykkum; enntá eins og hina grønu urt havi eg givið tykkum øll ting.

4 Men kjøt við lívi tess, *sum er* blóð tess, skulu tit ikki eta.
5 Og vissuliga, tykkara blóð av tykkara lívum vil eg krevja; av hondini á hvørjum djóri vil eg krevja tað, og av hondini á manni; av hondini á bróður hvørs mans vil eg krevja lív mans.
6 Hvør*iðso* úthellir blóð mans, av manni skal hansara blóð verða úthelt: tí at í Guðs mynd gjørdi hann mann.
7 Og tit, verið tit ávakstasom, og margfaldist; berið fram ríkiligani á jørðini, og margfaldist á henni.
8 ¶ Og Guð mælti við Nóah, og til sona hansara við honum, sigandi,
9 Og eg, sí, eg grundleggi mín sáttmála við tykkum, og við tykkara sáð eftir tykkum;
10 Og við hvørja livandi skepnu sum *er* hjá tykkum, av fuglinum, av fenaðinum, og av hvørjum djóri jarðarinnar hjá tykkum; frá øllum sum ganga út úr ørkini, til hvørt djór jarðarinnar.
11 Og eg vil grundleggja mín sáttmála við tykkum; eiheldur skal alt kjøt verða skorið av meira við^ vøtnunum av eini flóð; eiheldur skal meira verða ein flóð til at oyða jørðina.
12 Og Guð segði, Hetta *er* tekin sáttmálans, sum eg geri ímillum meg og tykkum og hvørja livandi skepnu sum *er* hjá tykkum, fyri allar áframhaldandi ættir:
13 Eg seti mín boga í skýggið, og hann skal verða fyri eitt tekin av einum sáttmála ímillum meg og jørðina.
14 Og tað skal bera á, tá ið eg føri eitt skýggj yvir jørðina, at bogin skal síggjast í skýgginum:
15 Og eg vil minnast mín sáttmála, sum *er* ímillum meg og tykkum og hvørja livandi skepnu av øllum kjøti; og vøtnini skulu ei meira gerast ein flóð til at oyða alt kjøt.
16 Og bogin skal vera í skýgginum; og eg vil hyggja uppá hann, at eg má minnast hin ævigtvarandi sáttmála ímillum Guð og hvørja livandi skepnu av øllum kjøti sum *er* uppiá jørðini.
17 Og Guð segði við Nóah, Hetta *er* tekin sáttmálans, sum eg havi grundlagt ímillum meg og alt kjøt sum *er* uppiá jørðini.
18 ¶ Og synirnir hjá Nóah, sum fóru fram út úr ørkini, vóru Sjem, og Ham, og Já´-phēth: og Ham *er* faðir Cánaans.
19 Hesir *eru* teir tríggir synir Nóah: og av teimum varð øll jørðin yvirbreidd.
20 Og Nóah fór undir *at vera* jarðyrkismaður, og hann plantaði ein víngarð:
21 Og hann drakk av víninum, og varð drukkin; og hann var óhuldur fyri innan tjald sítt.
22 Og Ham, faðir Cánaans, sá nakni faðirs síns, og segði báðum brøðrum sínum *frá* fyri uttan.
23 Og Sjem og Já´-phēth tóku eitt klæði, og løgdu *tað* uppá herðarnar hjá teimum báðum, og fóru aftureftir, og dekkaðu nakni faðirs síns; og teirra andlit *vóru* aftureftir, og teir sóu ikki nakni faðirs síns.
24 Og Nóah vaknaði frá víni sínum, og vitsti hvat yngri sonur hansara hevði gjørt honum.
25 Og hann segði, Bannaður *veri* Cánaan; ein tænari av tænarum skal hann vera brøðrum sínum.
26 Og hann segði, Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Sjems; og Cánaan skal vera tænari hansara.
27 Guð skal vaksa um Já´-phēth, og hann skal dvøljast í tjøldum Sjems; og Cánaan skal vera tænari hansara.
28 ¶ Og Nóah livdi eftir flóðina trý hundrað og fimti ár.
29 Og allir dagarnir hjá Nóah vórðu níggju hundrað og fimti ár: og hann doyði.

KAPITUL 10

NÚ, hetta *eru* ættirnar hjá sonum Nóah, Sjem, Ham og Já´phĕth: og teimum vórðu synir føddir eftir flóðina.

2 Synir Já´phĕth-s, Gō´mĕr, og Má´gōg, og Mā´dâi, og Já´văn, og Tū´băl, og Mē´sjĕch, og Tī´rās.

3 Og synir Gō´mĕr-s, Ăsj´kĕnăz, og Rĭ´phath, og Tò-gär´mäh.

4 Og synir Já´văn-s; Ê-lĭ´sjäh, og Tarsjisj, Kittim, og Dō´dă-nĭm.

5 Viðˆ hesum vórðu oyggjar Heidninganna deildar í londum teirra; hvør *og* ēin eftir tungu síni, eftir familjum teirra, í tjóðum teirra.

6 ¶ Og synir Hams; Cŭsj, og Mĭz´râ-ĭm, og Phŭt, og Cānaan.

7 Og synir Cŭsj; Sē´bă, og Há´vĭ-lăh, og Săb´tăh, og Rā´ămâh, og Săb´tē-chă: og synir Rā´ă-mâh; Sjē´bă og Dē´dăn.

8 Og Cŭsj gat Nimrod: hann byrjaði at vera ein mektigur ēin á jørðini.

9 Hann var ein mektigur veiðimaður frammi fyri HARRANUM: hvørsvegna tað verður sagt, Enntá eins og Nimrod, hin mektigi veiðimaðurin frammi fyri HARRANUM.

10 Og byrjanin av hansara kongadømi var Bábel, og Ĕr´ĕch, og Ăk´kăd, og Căl´nĕh, í landi Sjĭ´nâr-s.

11 Út úr tí landinum gekk út Ässj´ûr, og bygdi Nĭn´ĕ-vēh, og staðin Rē´hō-bōth, og Cā´lâh,

12 Og Rē´sĕn ímillum Nĭn´ĕvēh og Cā´lâh: hin sami *er* ein mikil staður.

13 Og Mĭz´râ-ĭm gat Lū´dĭm, og Án´ă-mĭm, og Lē-há´bĭm, og Năph´tū-hĭm,

14 Og Păth´rū-sĭm, og Căs´lūhĭm, (út úr hvørjum komu Philistim,) og Căph´tŏ-rĭm.

15 ¶ Og Cānaan gat Sĭ´dŏn sín fyrstafødda, og Heth,

16 Og Jĕb-ū-sĭt´an, og Amoritan, og Gĭr-gäs-ĭt´an,

17 Og Hĭ-vĭt´an, og Är-kĭt´an, og Sĭ-nĭt´an,

18 Og Är-vă-dĭt´an, og Zĕm-ărĭt´an, og Há-măth-ĭt´an: og síðan vórðu ættargreinir Cānaanitanna spreiddar útumkring.

19 Og landamarkið hjá Cānaanitunum var frá Sĭ´dŏn, sum tú kemurt til Gĕ´râr, at Gā´zā; sum tú fert, at Sodomu, og Gōmŏr´rûh, og Äd´mūh, og Zē´bŏïm, enntá at Lá´sjă.

20 Hesir *eru* synir Hams, eftir familjum teirra, eftir tungumálum teirra, í londum teirra, *og* í tjóðum teirra.

21 ¶ Sjemi eisini, faðirinum at øllum børnum Ē´bĕr-s, bróður Já´phĕth-s hins eldra, enntá til hansara vórðu *børn* fødd.

22 Børn Sjems; Ē´lăm, og Ässj´ûr, og Är-phăx´ăd, og Lūd, og Ár´ăm.

23 Og børn Ár´ăm-s; Ûz, og Hūl, og Gē´thĕr, og Masj.

24 Og Är-phăx´ăd gat Sā´lâh; og Sā´lâh gat Ē´bĕr.

25 Og Ē´bĕr-i vórðu føddir tveir synir: navnið hjá ēinum *var* Pē´lĕg; tí at á hansara døgum varð jørðin deild; og navnið hjá bróður hansara *var* Jōk´tăn.

26 Og Jōk´tăn gat Ăl´mō-dăd, og Sjē´lĕph, og Hā-zâr-má´vĕth, og Jē´răh,

27 Og Há´dōr-ăm, og Ū´zăl, og Dĭk´lâh,

28 Og Ó´băl, og Ă-bĭm´â-ĕl, og Sjē´bă,

29 Og Ō´phĭr, og Há´vĭ-lăh, og Jó´băb: allir hesir *vóru* synir Jōk´tăn-s.

30 Og teirra bústaður var frá Mē´sjă, sum tú fert at Sē´phâr, einum fjalli eystursins.

31 Hesir *eru* synir Sjems, eftir teirra familjum, eftir teirra tungumálum, í teirra londum, eftir teirra tjóðum.

32 Hetta *eru* familjurnar hjá sonum Nóah, eftir teirra ættum, í teirra tjóðum: og viðˆ hesum vórðu tjóðirnar deildar á jørðini eftir flóðina.

KAPITUL 11

OG øll jørðin var av ēinum tungumáli, og av ēinari talu.
2 Og tað bar á, sum teir ferðaðust úr eystri, at teir funnu ein slætta í landi Sjī´-nâr-s; og teir dvaldust har.
3 Og teir søgdu hvør til annan, Komið, latum okkum gera tigulstein, og brenna teir grundigani. Og teir høvdu tigulstein til stein, og jarðbik høvdu teir til mørtil.
4 Og teir søgdu, Komið, latum okkum byggja okkum ein stað og eitt torn, hvørs tindur *kann røkka* at himni; og latum okkum gera okkum eitt navn, at ikki vit verði spjaddir útumkring uppiá ásjónini á allari jørðini.
5 Og HARRIN kom niður til at sjá staðin og tornið, sum mannabørnini bygdu.
6 Og HARRIN segði, Sí, fólkið *er* ēitt, og teir hava allir ēitt tungumál; og hetta fara teir undir at gera: og nú vil einkið verða hildið aftur frá teimum, sum teir hava ímyndað at gera.
7 Komið, latum oss fara niður, og har ørkymla tungumálið hjá teimum, at teir mega ikki skilja hvørs annars talu.
8 So HARRIN spjaddi teir útumkring haðani frá uppá ásjónina á allari jørðini: og teir lættu av at byggja staðin.
9 Tí er navnið á honum kallað Bábel; av tí at HARRIN har ørkymlaði tungumálið hjá allari jørðini: og haðani frá spjaddi HARRIN teir útumkring uppá ásjónina á allari jørðini.
10 ¶ Hetta *eru* ættir Sjems: Sjem *var* eitt hundrað ára gamalur, og gat Ăr-phăx´-ăd, tvey ár eftir flóðina:
11 Og Sjem livdi, eftir *at* hann gat Ăr-phăx´-ăd, fimm hundrað ár, og gat synir og døtur.
12 Og Ăr-phăx´-ăd livdi fimm og tríati ár, og gat Sā´-lâh:
13 Og Ăr-phăx´-ăd livdi, eftir *at* hann gat Sā´-lâh, fýra hundrað og trý ár, og gat synir og døtur.
14 Og Sā´-lâh livdi tríati ár, og gat Ē´-bĕr:
15 Og Sā´-lâh livdi, eftir *at* hann gat Ē´-bĕr, fýra hundrað og trý ár, og gat synir og døtur.
16 Og Ē´-bĕr livdi fýra og tríati ár, og gat Pē´-lĕg:
17 Og Ē´-bĕr livdi, eftir *at* hann gat Pē´-lĕg, fýra hundrað og tríati ár, og gat synir og døtur.
18 Og Pē´-lĕg livdi tríati ár, og gat Rē´-ū:
19 Og Pē´-lĕg livdi, eftir *at* hann gat Rē´-ū, tvey hundrað og níggju ár, og gat synir og døtur.
20 Og Rē´-ū livdi tvey og tríati ár, og gat Sē´-rŭg:
21 Og Rē´-ū livdi, eftir *at* hann gat Sē´-rŭg, tvey hundrað og sjey ár, og gat synir og døtur.
22 Og Sē´-rŭg livdi tríati ár, og gat Náhor:
23 Og Sē´-rŭg livdi, eftir *at* hann gat Náhor, tvey hundrað ár, og gat synir og døtur.
24 Og Náhor livdi níggju og tjúgu ár, og gat Tē´-râh:
25 Og Náhor livdi, eftir *at* hann gat Tē´-râh, eitt hundrað og nítjan ár, og gat synir og døtur.
26 Og Tē´-râh livdi sjeyti ár, og gat Ábram, Náhor, og Hár´-ăn.
27 ¶ Nú, hetta *eru* ættirnar hjá Tē´-râh: Tē´-râh gat Ábram, Náhor, og Hár´-ăn; og Hár´-ăn gat Lot.
28 Og Hár´-ăn doyði áðrenn faðir sín Tē´-râh í landi uppruna síns, í Ūr Chăl-dē´-anna.
29 Og Ábram og Náhor tóku sær ektakonur: navnið hjá konu

Ábrams *var* Sár´-â-ī; og navnið hjá konu Náhors, Mīl´-câh, dóttir Hár´-ăn-s, faðir Mīl´-cŭh, og faðir Ĭs´-cŭh.

30 Men Sár´-â-ī var óburin; hon *átti* einkið barn.

31 Og Tĕ´-râh tók Ábram, son sín; og Lot, son Hár´-ăn-s, sonarson sín; og Sár´-â-ī, verdóttur sína, konu sonar síns Ábrams; og tey fóru fram við teimum frá Ur Chăl-dĕ´-anna, til at fara inn í land Cānaans; og tey komu at Hár´-ăn, og dvaldust har.

32 Og dagar Tĕ´-râh vórðu tvey hundrað og fimm ár: og Tĕ´-râh doyði í Hár´-ăn.

KAPITUL 12

NÚ, HARRIN hevði sagt við Ábram, Slepp tær út úr landi tínum, og frá ættarfólki tínum, og frá húsi faðirs tíns, at einum landi sum eg vil vísa tær:

2 Og eg vil gera úr tær eina mikla tjóð, og eg vil vælsigna teg, og gera navn títt stórt; og tú skalt verða ein signing:

3 Og eg vil vælsigna teir sum vælsigna teg, og banna hann sum bannar teg: og í tær skulu allar familjur jarðarinnar verða vælsignaðar.

4 So Ábram fór avstað, eins og HARRIN hevði talað við hann; og Lot fór við honum: og Ábram *var* sjeyti og fimm ára gamalur, tá ið hann fór avstað út úr Hár´-ăn.

5 Og Ábram tók Sár´-â-ī, konu sína; og Lot, bróðurson sín; og alt teirra *figgjar*evni sum teir høvdu savnað, og tær sálir sum teir høvdu fingið í Hár´-ăn; og tey fóru avstað *fyri* at fara inn í land Cānaans; og inn í Cānaans land tey komu.

6 ¶ Og Ábram fór ígjøgnum landið at plássi Sī´-chĕm-s, at Mō´-rĕh slætta. Og Cānaanitin *var* tá í landinum.

7 Og HARRIN birtist Ábrami, og segði, Tínum sáði vil eg geva hetta landið: og har bygdi hann eitt altar at HARRANUM, sum birtist honum.

8 Og hann burtflutti haðani frá at einum fjalli eystanfyri Beth-el, og sló upp tjald sítt, *havandi* Beth-el fyri vestan, og Hā´-ī fyri eystan: og har bygdi hann eitt altar at HARRANUM, og kallaði uppá navn HARRANS.

9 Og Ábram ferðaðist, farandi áfram enn ímóti suðuri.

10 ¶ Og tað var ein hungursneyð í landinum: og Ábram fór niður í Egyptaland til at útisita har; tí at hungursneyðin *var* svár í landinum.

11 Og tað bar á, tá ið hann var komin nær at fara inn í Egyptaland, at hann segði við Sár´-â-ī, konu sína, Síggj nú, eg veit, at tú *ert* ein vøkur kona at hyggja uppá:

12 Tí skal tað bera á, tá ið Egyptarnir skulu síggja teg, at teir skulu siga, Hetta *er* kona hansara: og teir vilja drepa meg, men teir vilja varðveita teg á lívi.

13 Sig, eg biði teg, tú *ert* systir mín: at tað má vita væl við *hjá* mær fyri tína skyld; og mín sál skal liva uppá grund av tær.

14 ¶ Og tað bar á, at tá ið Ábram var komin inn í Egyptaland, skoðaðu Egyptarnir kvinnuna, at hon *var* sera vøkur.

15 Prinsarnir eisini hjá Pharaoh sóu hana, og góvu henni viðmæli frammi fyri Pharaoh: og kvinnan varð tikin inn í hús Pharaohs.

16 Og hann fór væl við Ábrami fyri hennara skyld: og hann hevði seyð, og oksar, og asnar, og tænastumenn, og tænastumoyggjar, og øsnur, og kamelar.

17 Og HARRIN plágaði Pharaoh og hansara hús við miklum plágum orsakað av Sár´-â-ī, ektakonu Ábrams.

18 Og Pharaoh kallaði Ábram, og segði, Hvat *er* hetta, *sum* tú hevurt gjørt mær? hví segðirt tú mær ikki, at hon *var* kona tín?

19 Hví segðirt tú, Hon *er* systir mín? so eg mátti havt tikið hana til mín til konu: nú tessvegna, sí konu tína, tak *hana,* og far tín veg.

20 Og Pharaoh beyð monnum *sínum* viðvíkjandi honum: og teir sendu hann avstað, og konu hansara, og alt sum hann hevði.

KAPITUL 13

OG Ábram fór upp úr Egyptalandi, hann, og kona hansara, og alt sum hann hevði, og Lot við honum, í sunnan.

2 Og Ábram *var* sera ríkur í fenaði, í silvuri, og í gulli.

3 Og hann fór á ferðum sínum frá sunnan enntá til Beth-el, at plássinum, har hansara tjald hevði verið at byrja við, ímillum Beth-el og Hā´-ī;

4 At plássi altarsins, sum hann hevði gjørt har í fyrstani: og har kallaði Ábram á navn HARRANS.

5 ¶ Og Lot eisini, sum fór við Ábrami, hevði smáfæafylgir, og stórfæafylgir, og tjøld.

6 Og landið var ikkiført fyri at bera teir, at teir máttu dvalst saman: tí at teirra *figgjar*evni var mikið, so at teir fingu ikki dvalst saman.

7 Og har varð eitt stríð ímillum hirðarnar hjá fenaði Ábrams og hirðarnar hjá fenaði Lots: og Cānaanitin og Pê-rĭz-zīt´-in dvaldust tá í landinum.

8 Og Ábram segði við Lot, Lat tað einkið stríð vera, eg biði teg, ímillum meg og teg, og ímillum mínar hirðar og tínar hirðar; tí at vit *veri* brøður.

9 *Er* ikki alt landið frammi fyri tær? skil teg, eg biði teg, frá mær: um *tú vilt taka* vinstru hondina, tá vil eg fara til hinnar høgru; ella um *tú fari avstað* til hinnar høgru handar, tá vil eg fara til hinnar vinstru.

10 Og Lot lyfti upp eygum sínum, og skoðaði allan slætta Jordans, at hann *var* væl vatnaður allastaðni, áðrenn HARRIN oyddi Sodomu og Gō-mŏr´-rŭh, *enntá* sum HARRANS aldingarður, líka *sum* Egyptaland, sum tú kemurt til Zŏ´-ar.

11 Tá valdi Lot sær allan slætta Jordans; og Lot ferðaðist eystur-*eftir:* og teir skildu seg hvør frá øðrum.

12 Ábram dvaldist í landi Cānaans, og Lot dvaldist í staðum slættarins, og sló upp tjald *sítt* ímóti Sodomu.

13 Men menninir úr Sodomu *vóru* vondir og syndarar frammi fyri HARRANUM framúrliga.

14 ¶ Og HARRIN segði við Ábram, eftir at Lot var skilstur frá honum, Lyft upp nú eygum tínum, og lít frá staðnum har tú ert, norðureftir, og suðureftir, og eystureftir, og vestureftir:

15 Tí at alt landið sum tú sært, til tín vil eg geva tað, og til sáð títt um ævir.

16 Og eg vil gera sáð títt sum dust jarðarinnar: so at um maður kann upptelja dust jarðarinnar, *tá* skal sáð títt eisini verða upptalt.

17 Reis *teg,* gakk ígjøgnum landið eftir longd tess og eftir breidd tess; tí at eg vil geva tað at tær.

18 Tá burtflutti Ábram tjald *sítt,* og kom og dvaldist á slætta Mắm´-rê-s, sum *er* í Hē´-brŏn, og bygdi har eitt altar at HARRANUM.

KAPITUL 14

OG tað bar á í døgum Ăm´-râ-phĕl-s kongs av Sjī´-nár, Ár´-ī-ŏch-s kongs av Ēl´-lă-sár, Chē-dŏr-lâ-ō´-mĕr-s kongs av Ē´-lăm, og Tī´-dăl-s kongs av tjóðum;

2 *At hesir* fórdu kríggj við Bē´-ră kong av Sodomu, og við Bĭr´-sjă kong av Gō-mŏr´-rŭh, Sjī´-năb kong

av Ăd′-mŭh, og Sjĕm-ē′-bĕr kong av Zĕ-bō͞ı′-ĭm, og kongin av Bē′-lă, sum er Zō′-âr.

3 Allir hesir vóru sameintir saman í Sĭd′-dĭm-s dalinum, sum er salta havið.

4 Tólv ár tæntu teir Chê-dŏr-lâ-ō′-mĕr-i, og í tí trettanda árinum gjørdu teir uppreist.

5 Og í tí fjúrtanda árinum kom Chê-dŏr-lâ-ō′-mĕr, og kongarnir sum við honum *vóru,* og slógu Rê-phă-ĭm′-arnar í Ăsj′-tē-rōth Kăr-ná′-ĭm, og Zū-zĭm′-arnar í Ham, og Ē-mĭm′-arnar í Sjá′-vêh Kĭr-jâ-thá′-ĭm,

6 Og Hōr-ĭt′-arnar á teirra fjalli Sē′-ĭr, at Ēl-pár′-ăn, sum *er* við oyðuna.

7 Og teir vendu aftur, og komu til Ĕn-mĭsj′-păt, sum *er* Ká′-dēsj, og slógu alt land Â-măl-ĕk-ĭt′-anna, og eisini Amoritarnar, sum dvaldust í Hāz′-ê-zŏn-tá′-mâr.

8 Og tað fóru út kongurin av Sodomu, og kongurin av Gō-mŏr′-rŭh, og kongurin av Ăd′-mŭh, og kongurin av Zĕ-bō͞ı′-ĭm, og kongurin av Bē′-lă, (tað sama *er* Zō′-âr;) og teir sameintu bardaga við teir í Sĭd′-dĭm-s dalinum;

9 Við Chê-dŏr-lâ-ō′-mĕr, kongin av Ē′-lăm; og við Tĭ′-dăl kong av tjóðum, og Ăm′-râ-phĕl kong av Sjĭ′-nâr, og Ár′-ĭ-ōch kong av Ēl′-lă-sâr; fýra kongar við fimm.

10 Og Sĭd′-dĭm-s dalurin *var fullur av* jarðbiks-díkjum; og kongarnir av Sodomu og Gō-mŏr′-rŭh flýddu, og fullu har; og teir, sum vóru eftir, flýddu til fjallsins.

11 Og teir tóku alt góðs Sodomu og Gō-mŏr′-rŭh, og allar teirra vistir, og fóru sín veg.

12 Og teir tóku Lot, bróðurson Ábrams, sum búði í Sodomu, og hansara góðs, og fóru avstað.

13 ¶ Og har kom ēin, sum hevði komist undan, og segði Ábrami Hebrēara frá; tí at hann dvaldist í slætta Măm′-rê-s Amoriţa, bróður Ĕsj′-cŏl-s, og bróður Áners: og hesir *vóru* gingnir í felag við Ábram.

14 Og tá ið Ábram hoyrdi, at bróðir hansara var tikin *til* fanga, vápnaði hann sínar vandu *tænarar,* føddir í egna húsi hansara, trý hundrað og átjan, og elti *teir* at Dán.

15 Og hann deildi seg *sundur* ímóti teimum, hann og hansara tænarar, um nátt*ina,* og sló teir, og elti teir at Hó′-bâh, sum *er* á vinstru hondini av Damascus.

16 Og hann førdi aftur alt góðsið, og eisini førdi aftur bróður sín Lot, og hansara góðs, og kvinnurnar eisini, og fólkið.

17 ¶ Og kongurin av Sodomu fór út at møta honum eftir afturkomu hansara frá slátringini av Chê-dŏr-lâ-ō′-mĕr-i, og av kongunum sum *vóru* við honum, í Sjá′-vêh dali, sum *er* kongsins dalur.

18 Og Mĕl-chĭ′-zê-dĕk kongur av Sā′-lĕm førdi fram breyð og vín: og hann *var* prestur hins hægsta Guðs.

19 Og hann vælsignaði hann, og segði, Vælsignaður *veri* Ábram av hinum hægsta Guði, ánara himins og jarðar:

20 Og vælsignaður veri hin mest høgi Guð, sum hevur givið upp tínar fíggindar inn í hond tína. Og hann gav honum tíggjundir av øllum.

21 Og kongurin av Sodomu segði við Ábram, Gev mær persónarnar, og tak góðsið til tín sjálvs.

22 Og Ábram segði við kongin av Sodomu, Eg havi lyft upp mína hond at HARRANUM hinum hægsta Guði, ánara himins og jarðar,

23 At eg vil ikki *taka* frá einum tráði enntá til eina skótvong, og at eg vil ikki taka nakað ting sum *er* títt, at ikki tú skuldirt sagt, Eg havi gjørt Ábram ríkan:

24 Uttan einans tað sum teir ungu menninir hava etið, og skamtin hjá monnunum sum fóru við mær, Áner, Ēsj´-cŏl, og Măm´-rê; lat teir taka skamt sín.

KAPITUL 15

EFTIR hesi tingini kom orð HARRANS til Ábrams í eini sjón, sigandi, Óttast ikki, Ábram: eg *eri* skjøldur tín, *og* títt ovurhonds mikla endurgjald.

2 Og Ábram segði, Harri GUÐ, hvat vilt tú geva mær, við tað at eg gangi barnleysur, og bústjórin av mínum húsi *er* hesin Êl-ī-ē´-zĕr úr Damascus?

3 Og Ábram segði, Sí, til mín hevurt tú einkið sáð givið: og sí, ēin, føddur í húsi mínum, er mín arvingi.

4 Og sí, HARRANS orð *kom* at honum, sigandi, Hesin skal ikki vera arvingi tín; men hann, sum skal koma fram úr tínum egnu innangoymslum, skal vera arvingi tín.

5 Og hann førdi hann út um, og segði, Hygg nú ímóti himni, og tel stjørnurnar, um tú veri *teg* førur fyri at telja tær: og hann segði við hann, Svá skal sáð títt verða.

6 Og hann trúði á HARRAN; og hann roknaði tað til hansara til rættvísis.

7 Og hann segði við hann, Eg *eri* HARRIN, sum førdi teg út úr Ūr Chăl-dē´-anna, til at geva tær hetta landið til at arva tað.

8 Og hann segði, Harri GUÐ, hvarviðˆ skal eg vita, at eg skal arva tað?

9 Og hann segði við hann, Tak mær eina trý ára gamla kvígu, og eina trý ára gamla hon geit, og ein trý ára gamlan veðr, og eina turtildúgvu, og eina unga dúvu.

10 Og hann tók honum øll hesi, og deildi tey í miðjuni, og legði hvørt stykki hvørt yvir av øðrum: men fuglarnar deildi hann ikki.

11 Og tá ið fuglarnir komu niður á ræini, rak Ábram teir burtur.

12 Og tá ið sólin var farandi til viðar, fell ein djúpur svøvnur uppá Ábram; og sí, ein ræðsla av miklum myrkri fell omanyvir hann.

13 Og hann segði við Ábram, Vita við vissu, at títt sáð skal vera ein fremmandur í einum landi, *sum er* ikki teirra, og skulu tæna teimum; og teir skulu níva teir fýra hundrað ár;

14 Og eisini hasa tjóðina, hvørji teir skulu tæna, vil eg døma: og síðan skulu teir koma út við miklum *fíggjar*evni.

15 Og tú skalt fara til fedra tína í friði; tú skalt verða jarðaður í einum góðum, gomlum aldri.

16 Men í tí fjórða ættarliðinum skulu teir koma higar aftur: tí at misgerðin hjá Amoritunum *er* ikki enn full.

17 Og tað bar á, at tá ið sólin fór niður, og tað var myrkt, sí ein rúkandi bræðsluovnur, og ein brennandi lampa sum fór ímillum tey stykkini.

18 Á hinum sama degi gjørdi HARRIN ein sáttmála við Ábram, sigandi, Tínum sáði havi eg givið hetta landið, frá Egyptalands á at hini miklu á, ánni Ēv-phrā´-tēs:

19 Kē-nĭt´-arnar, og Kē-nĭz-zīt´-arnar, og Kăd-mô-nĭt´-arnar,

20 Og Hittitarnar, og Pê-rĭz-zīt´-arnar og Rê-phă-ĭm´-arnar,

21 Og Amoritarnar, og Cān-aanitarnar, og Gĭr-gă-sjĭt´-arnar, og Jĕb-ū-sĭt´-arnar.

KAPITUL 16

NÚ Sár´-â-ī, kona Ábrams, bar honum eingi børn: og hon hevði eina tænastumoyggj, eina Egyptiska, hvørs navn *var* Há´-gâr.

2 Og Sár´-â-ī segði við Ábram, Sí nú, HARRIN hevur hildið mær aftur frá at føða: eg biði teg, far inn at ternu míni; vera má, at mær má lutast børn av henni. Og Ábram lýddi á rødd Sár´-â-ī.

3 Og Sár´-â-ī, kona Ábrams, tók Há´-gâr, sína ternu ta Egyptisku, eftir at Ábram hevði búð tíggju ár í landi Cānaans, og gav hana til ektamans síns, Ábrams, til at vera kona hansara.

4 ¶ Og hann fór inn at Há´-gâr-i, og hon ól fram: og tá ið hon sá, at hon hevði alið fram, varð hennara húsfrúgv vanvird í eygum hennara.

5 Og Sár´-â-ī segði við Ábram, Mítt ranga *veri* uppiá tær: eg havi givið mína ternu inn í føvning tín; og tá ið hon sá, at hon hevði alið fram, varð eg vanvird í eygum hennara: HARRIN dømi ímillum meg og teg.

6 Men Ábram segði við Sár´-â-ī, Sí, tín terna *er* í hond tíni; ger við hana sum tað líkar tær. Og tá ið Sár´-â-ī fór harðligani við henni, flýddi hon frá andliti hennara.

7 ¶ Og eingil HARRANS fann hana við eina keldu av vatni í oyðuni, við kelduna á veginum til Sjūr.

8 Og hann segði, Há´-gâr, terna Sár´-â-ī, hvaðan komst tú? og hvagar vilt tú fara? Og hon segði, Eg flýggi frá andliti húsfrúar mínar, Sár´-â-ī.

9 Og eingil HARRANS segði við hana, Vend aftur til húsfrúar tínar, og gev teg undir hendur hennara.

10 Og eingil HARRANS segði við hana, Eg vil margfalda sáð títt framúrligani, at tað skal ikki verða talt fyri margfaldni.

11 Og eingil HARRANS segði við hana, Sí, tú *ert* við barn, og skalt føða ein son, og skalt kalla navn hansara Ísj´-mâ-ēl; av tí at HARRIN hevur hoyrt tína nívd.

12 Og hann vil verða ein villur maður; hansara hond *vil vera* ímóti hvørjum manni, og hvørs mans hond ímóti honum; og hann skal dvøljast í nærveruni av øllum sínum brøðrum.

13 Og hon kallaði navn HARRANS, sum talaði við hana, Tú, Guð, sært meg: tí at hon segði, Havi eg eisini her hugt eftir honum sum sær meg?

14 Hvørsvegna brunnurin varð kallaður Bēēr-lâ-hâï´-rōï; sí, *hann er* ímillum Ká´-dēsj og Bē´-rēd.

15 ¶ Og Há´-gâr føddi Ábrami son: og Ábram kallaði navn sonar síns, sum Há´-gâr føddi, Ísj´-mâ-ēl.

16 Og Ábram *var* fýrsinstjúgu og seks ára gamalur, tá ið Há´-gâr føddi Ísj´-mâ-ēl til Ábrams.

KAPITUL 17

OG tá ið Ábram var níti ára gamalur og níggju, birtist HARRIN fyri Ábrami, og segði við hann, Eg *eri* hin Almáttugi Guð; gakk frammi fyri mær, og vert tú fullkomin.

2 Og eg vil gera sáttmála mín ímillum meg og teg, og vil margfalda teg framúrliga.

3 Og Ábram fell á andlit sítt: og Guð talaði við hann, sigandi,

4 Hvat mær viðvíkur, sí, mín sáttmáli *er* við teg, og tú skalt verða ein faðir at mongum tjóðum.

5 Eiheldur skal navn títt meira verða kallað Ábram, men navn títt skal vera Ábraham; tí at ein faðir at mongum tjóðum havi eg gjørt teg.

6 Og eg vil gera teg framúr ávakstamiklan, og eg vil gera tjóðir úr tær, og kongar skulu koma út úr tær.

7 Og eg vil grunda mín sáttmála ímillum meg og teg og sáð títt eftir teg í teirra ættarliðum til ein ævigtvarandi sáttmála, at vera tær ein Guð, og fyri sáði tínum eftir teg.

8 Og eg vil geva tær, og til sáð títt eftir teg, landið, í hvørjum tú ert ein fremmandur, alt land Cānaans, til eina ævigtvarandi ogn; og eg vil vera Guð teirra.

9 ¶ Og Guð segði við Ábraham, Tú skalt halda mín sáttmála tessvegna, tú, og sáð títt eftir teg í teirra ættarliðum.

10 Hetta *er* mín sáttmáli, sum tit skulu halda, ímillum meg og teg og sáð títt eftir teg; Hvørt kallmans barn tykkara millum skal verða umskorið.

11 Og tit skulu umskera kjøt forhúðar tykkara; og tað skal vera eitt tekin sáttmálans ámilli mín og tykkara.

12 Og hann, sum er átta daga gamal, skal verða umskorin tykkara millum, hvørt kallmans barn í ættarliðum tykkara, hann sum er føddur í húsinum, ella keyptur við peningi frá nøkrum fremmandum, sum *er* ikki av sáði tínum.

13 Hann sum er føddur í húsi tínum, og hann sum er keyptur við peningi tínum, mugu neyðugt verða umskornir: og mín sáttmáli skal vera í tykkara kjøti til ein ævigtvarandi sáttmála.

14 Og tað óumskorna kallmans barn, hvørs kjøt forhúðar hans er ikki umskorið, tann sál skal verða skorin av frá fólki hans; hann hevur brotið sáttmála mín.

15 ¶ Og Guð segði við Ábraham, Hvat viðvíkur Sár´-â-ī, konu tíni, tú skalt ikki kalla navn hennara Sár´-â-ī, men Sárah *skal* navn hennara *vera*.

16 Og eg vil vælsigna hana, og geva tær ein son eisini av henni: ja, eg vil vælsigna hana, og hon skal verða *ein móðir* at tjóðum; kongar av fólkum skulu verða av henni.

17 Ábraham tá fell uppá andlit sítt, og læði, og segði í hjarta sínum, Skal *eitt barn* verða føtt honum sum er hundrað ára gamalur? og skal Sárah, sum er níti ára gomul, føða?

18 Og Ábraham segði við Guð, O at Ísj´-mâ-ĕl mátti livað frammi fyri tær!

19 Og Guð segði, Sárah, kona tín, skal føða tær ein son í roynd *og veru;* og tú skalt kalla navn hans Ísaak*ur:* og eg vil grunda mín sáttmála við hann til ein ævigtvarandi sáttmála, *og* við sáð hans eftir hann.

20 Og hvat viðvíkur Ísj´-mâ-ĕl-i, eg havi hoyrt teg: Sí, eg havi vælsignað hann, og vil gera hann ávakstamiklan, og vil margfalda hann framúrliga; tólv prinsar skal hann gita, og eg vil gera hann *til* eina mikla tjóð.

21 Men mín sáttmála vil eg grunda við Ísaak, hvønn Sárah skal føða tær á hesi ásettu tíð í tí næsta árinum.

22 Og hann lætti av at tala við hann, og Guð fór upp frá Ábrahami.

23 ¶ Og Ábraham tók Ísj´-mâ-ĕl, son sín, og allar sum vóru føddir í húsi hansara, og allar sum vóru keyptir við peningi hansara, hvørt kallkyn mannanna millum av húsi Ábrahams; og umskar kjøt forhúðar teirra á sjálvum tí sama deginum, eins og Guð hevði sagt honum.

24 Og Ábraham *var* níti ára gamalur og níggju, tá ið hann varð umskorin í kjøti forhúðar sínar.

25 Og Ísj´-mâ-ĕl, sonur hansara, *var* trettan ára gamalur, tá ið hann varð umskorin í kjøti forhúðar sínar.

26 Á sjálvum tí sama deginum varð Ábraham umskorin, og Ísj´-mâ-ĕl sonur hansara.

27 Og allir menninir av húsi hansara, føddir í húsinum, og keyptir við peningi frá hinum fremmanda, vórðu umskornir við honum.

KAPITUL 18

OG HARRIN birtist honum á Măm´-rê slættum: og hann sat í tjalddurinum í hita dagsins;
2 Og hann lyftir upp eygum sínum og hugdi, og sí, tríggir menn stóðu hjá honum: og tá ið hann sá *teir,* rann hann at møta teimum frá tjalddurinum, og boygdi seg ímóti jørðini,
3 Og segði, Mín Harri, um nú eg havi funnið yndi í eygum tínum, far ikki burtur, eg biði teg, frá tænara tínum:
4 Latið eitt sindur *av* vatni, eg biði tykkum, verða fingið, og tváið føtur tykkara, og hvílið tykkum undir træinum:
5 Og eg vil fara eftir einum breyðmola, og troystið tit hjørtu tykkara; eftir tað skulu tit fara áfram: tí at tessvegna eru tit komnir til tænara tykkara. Og teir søgdu, Soleiðis ger, sum tú hevurt sagt.
6 Og Ábraham skundaði *sær* inn í tjaldið til Sáruh, og segði, Ger tilreiðar skundisliga trý mál av fínum mjøli, knoða *tað,* og ger køkur uppiá grúgvuni.
7 Og Ábraham rann at stórfæafylginum, og heintaði ein kálv, mjúkan og góðan, og gav einum ungum manni *hann,* og hann skundaði *sær* at tilreiða hann.
8 Og hann tók smør, og mjólk, og kálvin sum hann hevði tilreitt, og setti *tað* frammanfyri teimum; og hann stóð hjá teimum undir træinum, og teir ótu.
9 ¶ Og teir søgdu við hann, Hvar *er* Sárah, kona tín? Og hann segði, Sí, í tjaldinum.
10 Og hann segði, Eg vil vissuliga koma aftur til tín samsvarandi við tíð lívs; og sí, Sárah, kona tín, skal hava ein son. Og Sárah hoyrdi *tað* í tjalddurinum, sum *var* aftanfyri hann.
11 Nú, Ábraham og Sárah *vóru* gomul *og* væl sligin í aldri; *og* tað gavst at vera hjá Sáruh á kvenna vísi.
12 Sárah tessvegna læði innan í sær sjálvari, sigandi, Eftir *at* eg eri vorðin gomul, skal eg hava njóting, mín harri verandi gamalur við?
13 Og HARRIN segði við Ábraham, Hvørsvegna læði Sárah, sigandi, Skal eg við vissu føða eitt barn, sum eri gomul?
14 Er nakað ting ov torført hjá HARRANUM? Á tíðini ásettu vil eg koma aftur til tín, samsvarandi við tíð lívs, og Sárah skal hava ein son.
15 Tá noktaði Sárah, sigandi, Eg læði ikki; tí at hon var rædd. Og hann segði, Nei; men tú læðirt.
16 ¶ Og menninir risu upp haðani frá, og litu ímóti Sodomu: og Ábraham fór við teimum at føra teir á veginum.
17 Og HARRIN segði, Skal eg fjala frá Ábrahami tað ting sum eg geri;
18 Við tað at Ábraham skal vissuliga verða ein mikil og mektig tjóð, og allar tjóðir jarðarinnar skulu verða vælsignaðar í honum?
19 Tí at eg kenni hann, at hann vil ábjóða børnum sínum og húshaldi sínum eftir seg, og tey skulu varðveita veg HARRANS, at inna rættvísi og dóm; at HARRIN má føra uppá Ábraham tað sum hann hevur talað um hann.
20 Og HARRIN segði, Av tí at rópið av Sodomu og Gō-mŏr´-rŭh er mikið, og av tí at teirra synd er ógvuliga hervilig;
21 Vil eg fara niður nú, og síggja hvørt teir havi gjørt fullkomiliga samsvarandi við rópið av tí sum komið er til mín; og um ikki, vil eg vita.
22 Og menninir vendu sínum andlitum haðani frá, og fóru ímóti Sodomu: men Ábraham stóð enn frammi fyri HARRANUM.

23 ¶ Og Ábraham nærkaðist, og segði, Vilt tú eisini oyða hin rættvísa við tí vonda?
24 Vera má, *at* tað eru fimti rættvísir fyri innan staðarins: vilt tú eisini oyða og ikki spara staðið fyri teir fimti rættvísu sum *eru* harí?
25 Hatta veri fjart frá tær, at gera eftir hesum háttarlagi, at slátra hin rættvísa við tí vonda: og at hin rættvísi skuldi verið sum hin vondi, hatta veri fjart frá tær: skal ikki Dómari alrar jarðarinnar inna rætt?
26 Og HARRIN segði, Um eg finni í Sodomu fimti rættvísar fyri innan staðarins, tá vil eg spara alt staðið fyri teirra sakir.
27 Og Ábraham svaraði og segði, Sí nú, eg havi tikið uppá meg at tala við Harran, sum *eri bert* dust og øskur:
28 Vera má, *at* tað skulu tróta fimm av teimum fimti rættvísu: vilt tú oyða allan staðin fyri *trot á* fimm? Og hann segði, Um eg finni har fýrati og fimm, vil eg ikki oyða *hann*.
29 Og hann talaði við hann uppaftur, og segði, Vera má, *at* tað skulu verða fýrati funnir har. Og hann segði, Eg vil ikki gera *tað* fyri fýrati skuld.
30 Og hann segði *við hann,* Á, lat ikki Harran verða firtnan, og eg vil tala: Vera má, *at* tað skulu tríati verða funnir har. Og hann segði, Eg vil ikki gera *tað,* um eg finni tríati har.
31 Og hann segði, Síggj nú, eg havi tikið upp á meg at tala við Harran: Vera má, *at* tað skulu verða tjúgu funnir har. Og hann segði, Eg vil ikki oyða *hann* fyri tjúgu skuld.
32 Og hann segði, Á, lat ikki Harran verða firtnan, og eg vil tala enn bert hesa ēinu ferðina: Vera má, *at* tíggju skulu verða funnir har. Og hann segði, Eg vil ikki oyða *hann* fyri tíggju skuld.
33 Og HARRIN fór sín veg, so skjótt sum hann var givin at samtala við Ábraham: og Ábraham vendi aftur at plássi sínum.

KAPITUL 19

OG tað komu tveir einglar til Sodomu um aftan; og Lot sat í portri Sodomu: og Lot, síggjandi *teir,* reis upp at møta teimum; og boygdi seg við sínum andliti ímóti jørðini;
2 Og hann segði, Síggið nú, mínir harrar, vendið inn, eg biði tykkum, inn í hús tænara tykkara, og dvøljið alla nátt, og tváið tykkara føtur, og tit skulu rísa upp árla, og fara á leiðum tykkara. Og teir søgdu, Nei; men vit vilja verða *verandi* í gøtuni *í* alla nátt.
3 Og hann strongdi á teir stórligani; og teir vendu inn til hansara, og fóru inn í hús hansara; og hann gjørdi teimum eina veitslu, og bakaði ósúrgað breyð, og teir ótu.
4 ¶ Men áðrenn teir løgdust niður, umringaðu menninir úr staðinum, *enntá* menninir úr Sodomu, húsið umkring, bæði gamlir og ungir, alt fólkið frá hvørjum *heraðs*horni:
5 Og teir kallaðu á Lot, og søgdu við hann, Hvar *eru* menninir sum komu inn til tín hesa nátt? før teir út at okkum, at vit mega kenna teir.
6 Og Lot fór út við dyrnar til teirra, og læt aftur hurðina eftir seg,
7 Og segði, Eg biði tykkum, brøður, gerið ikki so vondliga.
8 Sí nú, eg havi tvær døtur, sum hava ikki kent mann; latið meg, eg biði tykkum, føra tær út at tykkum, og gerið tit við tær sum *er* gott í eygum tykkara: einans hesum monnunum gerið einkið; tí at tessvegna komu teir undir skuggan av taki mínum.

9 Og teir søgdu, Statt tilbakar. Og teir søgdu *aftur,* Hesin ēini *felagin* kom inn at útisita, og hann vil endiliga vera ein dómari: nú vilja vit fara verri við tær enn við teimum. Og teir strongdu sáran uppá mannin, *enntá* Lot, og komu nær at bróta hurðina.

10 Men menninir koyrdu fram sína hond, og togaðu Lot inn í húsið til sín, og lokaðu fyri hurðina.

11 Og teir slógu menninar, sum *vóru* við dyrnar av húsinum, við blindleika, bæði smáar og stórar: so at teir møddu seg at finna hurðina.

12 ¶ Og menninir søgdu við Lot, Hevurt tú her nakran umframt? verson, og synir tínar, og døtur tínar, og hvatsumhelst tú hevurt í staðinum, før *tey* út úr hesum plássinum:

13 Tí at vit vilja oyða hetta stað, av tí at rópið av teimum er vaksið mikið frammi fyri andliti HARRANS; og HARRIN hevur sent okkum at oyða tað.

14 Og Lot fór út, og talaði við sínar versynir, sum giftu *seg* við døtrum hansara, og segði, Upp, sleppið tykkum út úr hesum plássi; tí at HARRIN vil oyða henda stað. Men hann tóktist sum ēin sum spottaði yvirfyri versonum sínum.

15 ¶ Og tá ið morgunin reistist, tá skundaðu einglarnir undir Lot, sigandi, Reis *teg,* tak konu tína, og døtur tínar tvær, sum eru her; at ikki tú verði upptærdur í misgerðini hjá staðinum.

16 Og meðan hann drálaði, løgdu menninir hald uppá hond hansara, og uppá hondina á konu hansara, og uppá hondina á døtrum hansara tveim; HARRIN verandi miskunnarfullur at honum: og teir førdu hann út, og settu hann uttanfyri staðin.

17 ¶ Og tað bar á, tá ið teir høvdu ført tey út um, at hann segði, Kom *tær* undan fyri títt lív; hygg ikki afturum teg, eiheldur steðgi tú á øllum slættanum; kom *tær* undan til fjallsins, at ikki tú verði upptærdur.

18 Og Lot segði við teir, Á, ikki so, Harri mín:

19 Síggj nú, tænari tín hevur funnið náði í eygsjón tíni, og tú hevurt stórgjørt tína miskunn, sum tú hevurt sýnt at mær í at frelsa mítt lív; og eg kann ikki koma *mær* undan til fjallsins, at ikki okkurt ilt taki meg, og eg doyggi:

20 Síggj nú, hesin staður *er* nær at flýggja at, og hann *er* ein lítil ēin: Á, lat meg koma *mær* undan hagar, (*er* hann ikki ein lítil ēin?), og sál mín skal liva.

21 Og hann segði við hann, Sí, eg havi góðtikið teg viðvíkjandi hesum tingi við, at eg vil ikki kollrenna henda stað, fyri hvønn tú hevurt talað.

22 Skunda tær, kom *tær* undan hagar; tí at eg kann ikki gera nakað ting, til tú veri komin hagar. Tí varð navnið á staðinum kallað Zō´-ār.

23 ¶ Sólin var risin uppá jørðina, tá ið Lot fór inn í Zō´-ār.

24 Tá regnaði HARRIN omanyvir Sodomu og omanyvir Gō-mōr´-rūh svávul og eld frá HARRANUM út úr himni;

25 Og hann kollrendi hasar staðirnar, og allan slættan, og allar íbúgvarnar av staðunum, og tað sum vaks uppiá lendinum.

26 ¶ Men kona hansara hugdi tilbakar frá fyri aftan hann, og hon gjørdist ein saltstólpi.

27 ¶ Og Ábraham fór upp árla um morgunin til staðið har hann stóð frammi fyri HARRANUM:

28 Og hann leit ímóti Sodomu og Gō-mōr´-rūh, og ímóti øllum landi slættarins, og skoðaði, og sí, roykurin av landinum fór upp sum roykurin úr einum bræðsluovni.

29 ¶ Og tað bar á, tá ið Guð oyddi staðir slættarins, at Guð mintist til Ábrahams, og sendi Lot út úr miðjari kollrenningini, tá ið hann kollrendi staðirnar, í hvørjum Lot dvaldist.

30 ¶ Og Lot legði avstað út úr Zŏ´-âr, og dvaldist á fjallinum, og hansara døtur tvær við honum; tí hann óttaðist at dvøljast í Zŏ´-âr: og hann dvaldist í einum helli, hann og døtur hansara tvær.

31 Og hin fyrstafødda segði við ta yngru, Okkara faðir *er* gamal, og *tað er* ikki maður á jørðini at koma inn at okkum eftir alrar jarðar vísi:

32 Kom, latum okkum fáa faðir okkara *at* drekka vín, og vit vilja liggja hjá honum, at vit mega varðveita sáð av faðir okkara.

33 Og tær fingu faðir sín *at* drekka vín tað kvøldið: og hin fyrstafødda fór inn, og lá hjá faðir sínum; og hann varnaðist ikki tá ið hon legðist niður, ella tá ið hon reistist.

34 Og tað bar á um morgnárið, at hin fyrstafødda segði við ta yngru, Sí, eg lá gjáranáttina hjá faðir mínum: latum okkum fáa hann *at* drekka vín hetta kvøldið við; og far tú inn, *og* ligg hjá honum, at vit mega varðveita sáð av faðir okkara.

35 Og tær fingu faðir sín *at* drekka vín tað kvøldið við: og hin yngra reistist, og lá hjá honum; og hann varnaðist ikki tá ið hon legðist niður, ella tá ið hon reistist.

36 Soleiðis vórðu báðar døtur Lots við barn av faðir sínum.

37 Og hin fyrstafødda føddi son, og kallaði navn hansara Móab: hin sami *er* faðir Móabitanna at hesum degi.

38 Og hin yngra, hon eisini føddi son, og kallaði navn hansara Bĕn-ăm´-mī: hin sami *er* faðir Ammons barna at hesum degi.

KAPITUL 20

OG Ábraham ferðaðist haðani frá ímóti suðurlandinum, og dvaldist ímillum Ká´-dĕsj og Sjūr, og útisat í Gĕ´-râr.

2 Og Ábraham segði um Sáruh, konu sína, Hon *er* systir mín: og Â-bī´-mê-lĕch kongur av Gĕ´-râr sendi, og tók Sáruh.

3 Men Guð kom til Â-bī´-mê-lĕch-s í einum dreymi um nátt*ina,* og segði til hansara, Sí, tú *ert bert* deyður maður, vegna kvinnuna sum tú hevurt tikið; tí at hon *er* kona mans.

4 Men Â-bī´-mê-lĕch hevði ikki komið nær henni: og hann segði, Harri, vilt tú vega eisini eina rættvísa tjóð?

5 Segði hann ikki við meg, Hon *er* systir mín? og hon, eisini hon sjálv segði, Hann *er* bróðir mín: í falsloysi hjarta míns og sakloysi handa mína havi eg gjørt hetta.

6 Og Guð segði við hann í einum dreymi, Ja, eg veit at tú gjørdirt hetta í falsloysi hjarta tíns; tí at eg eisini helt tær aftur frá at synda ímóti mær: tí loyvdi eg tær ikki at nema við hana.

7 Nú tessvegna, fá manninum aftur konu *hansara;* tí at hann *er* ein prophetur, og hann skal biðja fyri tær, og tú skalt liva: og um tú lati *hana* ikki aftur, viti tú, at tú skalt vissuliga doyggja, tú, og øll sum *eru* tíni.

8 Tí reis Â-bī´-mê-lĕch árla um morgunin, og kallaði allar tænarar sínar, og segði frá øllum hesum lutunum í oyru teirra: og menninir vóru sára ræddir.

9 Â-bī´-mê-lĕch tá kallaði Ábraham, og segði við hann, Hvat hevurt tú gjørt okkum? og hvat havi eg meinbogað teg, at tú hevurt ført á meg og á kongadømi mítt eina mikla synd? tú hevurt gjørt gerðir at mær, sum áttu ikki at verðið gjørdar.

10 Og Â-bī´-mê-lēch segði við Ábraham, Hvat sást tú, at tú hevurt gjørt henda lut?

11 Og Ábraham segði, Av tí at eg hugsaði, Vissuliga *er* óttin fyri Guði ikki í hesum plássi; og teir vilja vega meg fyri konu mínar skyld.

12 Og tó vissuliga *er hon* systir mín; hon *er* dóttir faðirs míns, men ikki dóttir móður mínar; og hon gjørdist kona mín.

13 Og tað bar á, tá ið Guð elvdi mær at reika frá húsi faðirs míns, at eg segði við hana, Hetta *er* tín blíðsemi, sum tú skalt sýna mær; á hvørjum plássi, hvagar vit skulu koma, sig um meg, Hann *er* bróðir mín.

14 Og Â-bī´-mê-lēch tók seyð, og oksar, og kalltænarar, og kvenntænarar, og gav Ábrahami *tey,* og fekk honum aftur Sáruh, konu hansara.

15 Og Â-bī´-mê-lēch segði, Sí, mítt land *er* frammi fyri tær: búgv har tað hóvar tær.

16 Og við Sáruh segði hann, Sí, eg havi givið bróður tínum eitt túsund *stykkir* av silvuri: sí, hann *er* hjá tær ein dekking av eygunum, at øllum sum við tær *eru,* og hjá øllum *øðrum:* svá varð hon formanað.

17 ¶ So Ábraham bað til Guðs: og Guð grøddi Â-bī´-mê-lēch, og konu hansara, og tænastumoyggjar hansara; og tær føddu *børn.*

18 Tí at HARRIN hevði fast lokað fyri øllum lívmøðrum Â-bī´-mê-lēch-s húss, uppá grund av Sáruh, konu Ábrahams.

KAPITUL 21

OG HARRIN vitjaði Sáruh, sum hann hevði sagt; og HARRIN gjørdi innat Sáruh, eins og hann hevði talað.

2 Tí at Sárah ól fram, og føddi Ábrahami son á gamalsaldri hansara, við *hina* settu tíð, um hvørja Guð hevði talað til hansara.

3 Og Ábraham kallaði navnið hjá syni sínum sum varð føddur honum, hvønn Sárah føddi til hansara, Ísaak*ur.*

4 Og Ábraham umskar son sín Ísaak, verandi átta daga gamalur, eins og Guð hevði boðið honum.

5 Og Ábraham var eitt hundrað ára gamalur tá ið sonur hansara, Ísaak*ur,* varð føddur honum.

6 ¶ Og Sárah segði, Guð hevur fingið meg at læa, *so at* øll, sum hoyra, vilja læa við mær.

7 Og hon segði, Hvør vildi havt sagt við Ábraham, at Sárah skuldi havt givið børnum *at* súgva? tí at eg havi føtt *honum* son á gamalsaldri hansara.

8 Og barnið vaks, og varð vant *av brósti:* og Ábraham gjørdi eina mikla veitslu hin *sama* dag sum Ísaak*ur* varð vandur *av brósti.*

9 ¶ Og Sárah sá sonin hjá Há´-gâr-i tí Egyptisku, sum hon hevði føtt Ábrahami, háðandi.

10 Hvørsvegna hon segði við Ábraham, Kasta út hesa trælkvinnu og son hennara: tí at sonurin hjá hesi trælkvinnuni skal ikki vera arvingi við syni mínum, *enntá* við Ísaaki.

11 Og tingið var sera svárligt í eygsjón Ábrahams, uppá grund av syni hansara.

12 ¶ Og Guð segði við Ábraham, Lat tað ikki vera svárligt í eygsjón tíni uppá grund av piltinum, og uppá grund av trælkvinnu tíni; í øllum, sum Sárah hevur sagt við teg, lýð á rødd hennara; tí at í Ísaaki skal sáð títt verða kallað.

13 Og eisini av syninum hjá trælkvinnuni vil eg gera eina tjóð, av tí at hann *er* sáð títt.

14 Og Ábraham reis upp árla um morgunin, og tók breyð, og eina fløsku av vatni, og gav Há´-gâr-i *tað,* setandi *tað* á øksl

hennara, og barnið, og sendi hana burtur: og hon fór avstað, og reikaði *um* í Bēēr´-sjĕ-bŭ oyðu.

15 Og vatnið varð uppbrúkt í fløskuni, og hon kastaði barnið undir ēin av runnunum.

16 Og hon fór, og setti seg niður yvir av *honum* eitt fitt petti frá, sum var tað eitt bogaskot: tí at hon segði, Lat meg ikki síggja deyða barnsins. Og hon sat yvir av *honum,* og lyfti upp rødd síni, og grætt.

17 Og Guð hoyrdi røddina hjá piltinum; og Guðs eingil kallaði til Há´-gâr-ar út úr himni, og segði við hana, Hvat bagir tær, Há´-gâr? óttast ikki; tí at Guð hevur hoyrt røddina hjá piltinum, har hann *er*.

18 Reis *teg,* lyft upp piltin, og halt honum í hond tíni; tí at eg vil gera hann *til* eina mikla tjóð.

19 Og Guð opnaði eygu hennara, og hon sá eina keldu av vatni; og hon fór, og fylti fløskuna við vatni, og gav piltinum drekka.

20 Og Guð var við piltinum; og hann vaks, og dvaldist í oyðuni, og gjørdist ein bogaskýtti.

21 Og hann dvaldist í Pár´ăn-s oyðu: og hansara móðir tók honum konu út úr Egyptalandi.

22 ¶ Og tað bar á við ta tíðina, at Â-bī´-mê-lĕch og Phī´-chŏl, tann fremsti høvuðsmaðurin av herliði hansara, talaðu við Ábraham, sigandi, Guð *er* við tær í øllum sum tú gert:

23 Nú tessvegna, svør mær her við Guð, at tú vilt ikki fara falsligani við mær, ella við syni mínum, ella við syni sonar míns: *men* samsvarandi við góðskuna, sum eg havi gjørt tær, skalt tú gera mær, og við landið, í hvørjum tú hevurt útisitið.

24 Og Ábraham segði, Eg vil svørja.

25 Og Ábraham formanaði Â-bī´-mê-lĕch uppá grund av einum vatnsbrunni, sum tænarar Â-bī´-mê-lĕch-s høvdu harðligani tikið burtur.

26 Og Â-bī´-mê-lĕch segði, Eg veit ikki hvør hevur gjørt hetta tingið: eiheldur segðirt tú mær, eiheldur enn hoyrdi eg *um tað,* uttan í dag.

27 Og Ábraham tók seyð og oksar, og gav Â-bī´-mê-lĕch-i tey; og báðir av teimum gjørdu ein sáttmála.

28 Og Ábraham setti sjey gimburlomb úr smáfæafylginum fyri seg sjálv.

29 Og Â-bī´-mê-lĕch segði við Ábraham, Hvat *merkja* hesi sjey gimburlombini, sum tú hevurt sett fyri seg sjálv?

30 Og hann segði, Tí at *hesi* sjey gimburlombini skalt tú taka av míni hond, at tey mega vera eitt vitni at mær, at eg havi grivið henda brunn.

31 Hvørsvegna hann kallaði tað plássið Bēēr´-sjĕ-bă; av tí at har svóru teir, báðir av teimum.

32 Svá gjørdu teir ein sáttmála í Bēēr´-sjĕ-bŭ: tá reis Â-bī´-mê-lĕch upp, og Phī´-chŏl, tann fremsti høvuðsmaðurin av herliði hansara, og teir vendu aftur inn í land Philistanna.

33 ¶ Og *Ábraham* plantaði eina lund í Bēēr´-sjĕ-bŭ, og kallaði har á navn HARRANS, hin ævigtvarandi Guð.

34 Og Ábraham útisat í landi Philistanna mangar dagar.

KAPITUL 22

OG tað bar á eftir hesi tingini, at Guð royndi Ábraham, og segði við hann, Ábraham: og hann segði, Sí, *her eri* eg.

2 Og hann segði, Tak nú son tín, tín ēinasta *son* Ísaak, hvønn tú elskart, og far tær inn í Mŏ´-rī-ăh land; og ofra hann har til eitt brennioffur uppiá ēinum av fjøllunum sum eg vil siga tær um.

3 ¶ Og Ábraham reis upp árla um morgunin, og saðlaði sín asna, og tók tveir av ungu monnum sínum við sær, og Ísaak, son sín, og kleyv viðin til brenniofrið, og reis upp, og fór á plássið, um hvørt Guð hevði sagt honum.

4 Síðan, á tí triðja deginum, lyfti Ábraham upp eygum sínum, og sá plássið langt burturifrá.

5 Og Ábraham segði við ungu menn sínar, Verðið tit her hjá asnanum; og eg og pilturin vilja fara haryvir og tilbiðja, og koma aftur til tykkara.

6 Og Ábraham tók brennioffurs viðin, og legði *hann* uppá Ísaak, son sín; og hann tók eldin í hond sína, og ein knív; og teir fóru báðir av teimum saman.

7 Og Ísaak*ur* talaði við Ábraham, faðir sín, og segði, Mín faðir: og hann segði, Her *eri* eg, sonur mín. Og hann segði, Síggj eldin og viðin: men hvar *er* lambið til eitt brennioffur?

8 Og Ábraham segði, Sonur mín, Guð vil skaffa seg sjálvan eitt lamb til eitt brennioffur: so teir fóru báðir av teimum saman.

9 Og teir komu til plássið sum Guð hevði sagt honum um; og Ábraham bygdi eitt altar har, og legði viðin til rættis, og bant Ísaak, son sín, og legði hann á altarið uppá viðin.

10 Og Ábraham strekti fram sína hond, og tók knívin til at vega son sín.

11 Og eingil HARRANS kallaði á hann út úr himni, og segði, Ábraham, Ábraham: og hann segði, Her *eri* eg.

12 Og hann segði, Legg ikki tína hond uppá piltin, eiheldur geri tú nakað ting innat honum: tí at nú veit eg, at tú óttarst Guð, við tað at tú hevurt ikki afturhildið son tín, tín ēinasta *son,* frá mær.

13 Og Ábraham lyfti upp eygum sínum, og hugdi, og sí aftanfyri *hann* ein veðrur, fangaður í einum kjarri eftir hornum sínum: og Ábraham fór og tók veðrin, og ofraði hann upp til eitt brennioffur í stað sonar síns.

14 Og Ábraham kallaði navnið á tí plássinum Jĕ-hō´-văh-jī´-rêh: eins og tað verður sagt *til* henda dag, Á HARRANS fjalli skal tað verða sæð.

15 ¶ Og eingil HARRANS kallaði á Ábraham út úr himni aðru ferðina,

16 Og segði, Við sjálvan meg havi eg svorið, sigur HARRIN, tí av tí at tú hevurt gjørt hetta tingið, og hevurt ikki afturhildið son tín, tín ēinasta *son:*

17 At í signing eg vil vælsigna teg, og í margfalding eg vil margfalda sáð títt sum stjørnur himinsins, og sum sandin sum *er* uppiá sævarstrondini; og sáð títt skal ognast portur fíggjinda sína;

18 Og í sáði tínum skulu allar tjóðir jarðarinnar verða vælsignaðar; av tí at tú hevurt lýtt mína rødd.

19 So Ábraham vendi aftur at ungu monnum sínum, og teir risu upp og fóru saman til Bēēr´-sjĕ-bŭ; og Ábraham dvaldist í Bēēr´-sjĕ-bŭ.

20 ¶ Og tað bar á eftir hesi tingini, at tað varð sagt Ábrahami, sigandi, Sí, Mĭl´-câh, hon hevur eisini føtt børn at bróður tínum Náhori;

21 Húz, hansara fyrstiføddi; og Bûz, bróðir hansara; og Kē´-mûĕl, faðir Ár´-ăm-s,

22 Og Chês´-ĕd, og Hā´-zō, og Pĭl´-dăsj, og Jĭd´-lăph, og Bē´-thûĕl.

23 Og Bē´-thû-ĕl gat Rebēkuh: hesi átta føddi Mĭl´-câh til Náhors, bróður Ábrahams.

24 Og hansara medkona, hvørs navn *var* Rĕŭ´-mâh, hon føddi eisini Tē´-bâh, og Gá´-hăm, og Tá´-hăsj, og Mā´-ă-chûh.

KAPITUL 23

OG Sárah varð eitt hundrað og sjey og tjúgu ára gomul: *hesi vóru* árini av lívi Sáruh.

2 Og Sárah doyði í Kĭr´-jăth-âr´-bă; tað sama *er* Hē´-brŏn í landi Cānaans: og Ábraham kom at harma yvir Sáruh, og at gráta yvir hana.

3 ¶ Og Ábraham stóð upp frammanfyri ífrá síni deyðu, og talaði við synir Heths, sigandi,

4 Eg *eri* ein fremmandur og ein útiseti hjá tykkum: gevið mær eina ogn til eitt jarðingarpláss hjá tykkum, at eg má jarða mína deyðu út úr eygsjón míni.

5 Og Heths børn svaraðu Ábrahami, sigandi við hann,

6 Hoyr okkum, harri mín: tú *ert* ein mektigur prinsur okkara millum: í hinum úrvals av okkara gravhýsum jarða tína deyðu; eingin av okkum skal afturhalda frá tær sítt gravhýsi, bert at tú mást jarða tína deyðu.

7 Og Ábraham stóð upp, og boygdi seg fyri fólki landsins, *enntá* fyri børnum Heths.

8 Og hann samtalaði við teir, sigandi, Um tað veri hugur tykkara, at eg skuldi jarða mína deyðu út úr eygsjón míni; hoyrið meg, og bønið fyri meg fyri Ē´-phrŏn-i Zŏ´-âr-s syni,

9 At hann má geva mær Măch-pē´-lâh helli, sum hann hevur, sum *er* í endanum av akri hansara; fyri so nógvan pening sum tað er vert skal hann geva tað mær til eina ogn av einum jarðingarplássi tykkara millum.

10 Og Ē´-phrŏn dvaldist millum Heths barna: og Ē´-phrŏn Hittiti svaraði Ábrahami í áhoyrn Heths barna, *enntá* alra sum fóru inn við portrini av staði hansara, sigandi,

11 Nei, harri mín, hoyr meg: akurin gevi eg tær, og hellið sum *er* harí, eg gevi tær tað; í nærveru sona fólks míns gevi eg tað tær: jarða tína deyðu.

12 Og Ábraham boygdi niður seg sjálvan frammi fyri fólki landsins.

13 Og hann talaði við Ē´-phrŏn í áhoyrnini av fólki landsins, sigandi, Men um tú *vilt geva hann,* eg biði teg, hoyr meg: eg vil geva tær pening fyri akurin; tak *hann* av mær, og eg vil jarða mína deyðu har.

14 Og Ē´-phrŏn svaraði Ábrahami, sigandi við hann,

15 Mín harri, lýð á meg: landið *er vert* fýra hundrað sjē´-kl-ar av silvuri; hvat *er* tað tín og mín ámillum? jarða tí tína deyðu.

16 Og Ábraham lýddi á Ē´-phrŏn; og Ábraham vigaði til Ē´-phrŏn-s silvurið, sum hann hevði nevnt í áhoyrnini á sonum Heths, fýra hundrað sjē´-kl-ar av silvuri, algongdur *peningur* hjá keypmanninum.

17 ¶ Og akurin hjá Ē´-phrŏn-i, sum *var* í Măch-pē´-lâh, sum *var* frammanfyri Măm´-rê, akurin, og hellið sum *var* harí, og øll trøini sum *vóru* í akrinum, sum *vóru* í øllum mørkunum rundan um, vórðu gjørd trygg

18 Innat Ábrahami til eina ogn í nærveru barna Heths, frammi fyri øllum sum fóru inn við portrini av hansara staði.

19 Og eftir hetta jarðaði Ábraham Sáruh, konu sína, í hellinum av Măch-pē´-lâh akri frammanfyri Măm´-rê: tað sama *er* Hē´-brŏn í landi Cānaans.

20 Og akurin, og hellið sum *er* harí, vórðu gjørd trygg innat Ábrahami til eina ogn av einum jarðingarplássi av sonum Heths.

KAPITUL 24

OG Ábraham var gamalur, *og* væl sligin í aldri: og HARRIN hevði vælsignað Ábraham í øllum tingum.

2 Og Ábraham segði við hin elsta tænaran av húsi sínum, sum ráddi yvir øllum sum hann hevði, Legg, eg biði teg, tína hond undir lend mína:

3 Og eg vil fáa teg *at* svørja við HARRAN, Guð himins, og Guð jarðarinnar, at tú skalt ikki taka syni mínum ektakonu av døtrum Cānaanitanna, hvørja millum eg dvøljist:

4 Men tú skalt fara at landi mínum, og til ættarfólks míns, og taka syni mínum Ísaaki konu.

5 Og tænarin segði við hann, Vera má, *at* kvinnan vilji ikki vera viljug at fylgja mær at hesum landi: má eg neyðugt føra son tín aftur at landinum, hvaðani frá tú komst?

6 Og Ábraham segði við hann, Vert tú varin, at tú føri ikki son mín hagar aftur.

7 ¶ HARRIN Guð himins, sum tók meg frá húsi faðirs míns, og frá landi ættarfólks míns, og sum talaði við meg, og sum svór mær, sigandi, Tínum sáði vil eg geva hetta land; hann skal senda eingil sín undan tær, og tú skalt taka syni mínum konu haðani frá.

8 Og um kvinnan vilji ikki vera viljug at fylgja tær, tá skalt tú vera leysur frá hesum eiði mínum: einans før ikki son mín hagar aftur.

9 Og tænarin legði sína hond undir lend Ábrahams, meistara síns, og svór fyri honum viðvíkjandi hasum máli.

10 ¶ Og tænarin tók tíggju kamelar av kamelum meistara síns, og fór avstað; tí alt góðsið hjá meistara hansara *var* í hond hansara: og hann reistist, og fór til Mê-sô-pô-tá´-mĭ-ŭ, at staði Náhors.

11 Og hann fekk sínar kamelar at knela niður uttanfyri staðin við ein brunn av vatni um aftanstíðina, *enntá* tíðina sum kvinnur fara út at draga *vatn*.

12 Og hann segði, O HARRI Guð meistara míns Ábrahams, eg biði teg, send mær blíðan byr henda dag, og sýn blídni at meistara mínum Ábrahami.

13 Sí, eg standi *her* við brunnin av vatni; og døturnar hjá monnum staðarins koma út at draga vatn:

14 Og lat tað bera á, at gentan, til hvørja eg skal siga, Set niður krukku tína, eg biði teg, at eg má drekka; og hon skal siga, Drekk, og eg vil geva kamelum tínum drekka eisini: *lat ta somu vera* hon *sum* tú hevurt útnevnt til tænara tíns Ísaaks; og harvið skal eg vita, at tú hevurt sýnt blídni innat meistara mínum.

15 ¶ Og tað bar á, áðrenn hann var liðugur at tala, at sí, Rebēkah kom út, hvør fødd var til Bĕ´-thû-ĕl-s, son Mĭl´-cŭh, konu Náhors, bróður Ábrahams, við síni krukku uppiá síni øksl.

16 Og gentan *var* sera fríð á at líta, ein jomfrúgv, eiheldur hevði nakar maður kent hana: og hon fór niður til brunnin, og fylti sína krukku, og kom upp.

17 Og tænarin rann at møta henni, og segði, Lat meg, eg biði teg, drekka eitt sindur *av* vatni úr krukku tíni.

18 Og hon segði, Drekk, harri mín: og hon skundaði *sær,* og læt niður sína krukku uppiá síni hond, og gav honum drekka.

19 Og tá ið hon hevði lokið *við* at geva honum drekka, segði hon, Eg vil draga *vatn* til kamela tína eisini, inntil teir havi lokið *við* at drekka.

20 Og hon skundaði *sær,* og tømdi sína krukku inn í trogið, og rann aftur at brunninum at draga *vatn,* og dró til allar kamelar hansara.

21 Og maðurin, undrandi yvir hana, helt friði sínum, til at vita

hvørt HARRIN hevði gjørt ferð hansara framgangsríka ella ikki.

22 Og tað bar á, sum kamelarnir høvdu lokið *við* at drekka, at maðurin tók ein gyltan oyrnaring á hálvan sjē´-kŭl-s vekt, og tvey armbond til hennara hendur *á* tíggju *sjē´-kl-a* vekt av gulli;

23 Og segði, Hvørs dóttir *ert* tú? sig mær, eg biði teg: er rúm *í* húsi faðirs tíns hjá okkum at halda til í?

24 Og hon segði við hann, Eg *eri* dóttir Bē´-thù-ĕl-s, sonar Míl´-cŭh, hvønn hon føddi Náhori.

25 Hon segði harafturat við hann, Vit hava nóg mikið bæði *av* hálmi og fóðuri, og rúm at halda til í.

26 Og maðurin boygdi niður høvur sítt, og tilbað HARRAN.

27 Og hann segði, Vælsignaður *veri* HARRIN Guð meistara míns Ábrahams, sum hevur ikki eftirlatið á berum meistara mín fyri miskunn sína og sannleika sín: eg, *verandi* á veginum, leiddi HARRIN meg til húsið hjá brøðrum meistara míns.

28 Og gentan rann, og segði *teimum av* húsi móður sínar hesar lutir.

29 ¶ Og Rebēkah hevði ein bróður, og navnið hjá honum *var* Lában: og Lában rann út at manninum, at brunninum.

30 Og tað bar á, tá ið hann sá oyrnaringin og armbondini uppiá hondunum hjá systur síni, og tá ið hann hoyrdi orðini hjá Rebēkuh, systur síni, sigandi, Svá talaði maðurin við meg; at hann kom at manninum; og sí, hann stóð hjá kamelunum við brunnin.

31 Og hann segði, Kom inn, tú vælsignaður av HARRANUM; hvørsvegna stendurt tú uttanfyri? tí at eg havi fyribúgvið húsið, og rúm til kamelarnar.

32 ¶ Og maðurin kom inn í húsið: og hann avgyrdi kamelar sínar, og gav hálm og fóður til kamelarnar, og vatn at tváa føtur hansara, og føturnar hjá monnunum sum við honum *vóru*.

33 Og tað varð settur *matur* frammanfyri honum at eta: men hann segði, Eg vil ikki eta, inntil eg havi sagt frá ørindi mínum. Og hann segði, Tala áfram.

34 Og hann segði, Eg *eri* tænari Ábrahams.

35 Og HARRIN hevur vælsignað meistara mín stórligani; og hann er vorðin mikil: og hann hevur givið honum smáfæafylgir, og stórfæafylgir, og silvur, og gull, og tænastumenn, og tænastumoyggjar, og kamelar, og asnar.

36 Og Sárah, kona meistara míns, føddi son til meistara míns, tá ið hon var gomul: og honum hevur hann givið alt sum hann hevur.

37 Og meistari mín fekk meg *at* svørja, sigandi, Tú skalt ikki taka konu til sonar míns av døtrum Cānaanitanna, í hvørs landi eg dvøljist:

38 Men tú skalt fara at húsi faðirs míns, og til ættarfólks míns, og taka syni mínum konu.

39 Og eg segði við meistara mín, Vera má, *at* kvinnan vilji ikki fylgja mær.

40 Og hann segði við meg, HARRIN, frammi fyri hvørjum eg gangi, vil senda eingil sín við tær, og *gera* veg tín framgangsríkan; og tú skalt taka konu til sonar míns av ættarfólki mínum, og av húsi faðirs míns:

41 Tá skalt tú vera leysur frá *hesum* eiði mínum, tá ið tú kemurt til ættarfólks míns; og um teir gevi ikki tær *ēina,* skalt tú vera leysur frá eiði mínum.

42 Og eg kom henda dag at brunninum, og segði, O HARRI Guð meistara míns Ábrahams, um nú tú *geri* framgangsríkan mín veg sum eg fari:

43 Sí, eg standi við brunnin
av vatni; og tað skal bera á, at tá
ið jomfrúgvin kemur út at draga
vatn, og eg sigi til hennara, Gev
mær, eg biði teg, eitt sindur *av*
vatni úr krukku tíni at drekka;
44 Og hon sigi til mín, Bæði
drekki tú, og eg vil eisini draga til
kamela tína: *lat* hina somu *vera*
kvinnan, hvørja HARRIN hevur út-
nevnt til sonar meistara míns.
45 Og áðrenn eg var lokin *við* at
tala í hjarta mínum, sí, Rebēkah
kom út við síni krukku á síni øksl;
og hon fór niður til brunnin, og
dró *vatn:* og eg segði við hana, Lat
meg drekka, eg biði teg.
46 Og hon skundaði *sær,* og
setti niður sína krukku frá síni
øksl, og segði, Drekk, og eg vil
geva kamelum tínum drekka
eisini: so eg drakk, og hon fekk
kamelarnar *at* drekka eisini.
47 Og eg spurdi hana, og segði,
Hvørs dóttir *ert* tú? Og hon segði,
Dóttir Bē´-thû-ĕl-s, Náhors sonar,
hvønn Mĭl´-câh føddi honum: og
eg koyrdi oyrnaringin uppá and-
lit hennara, og armbondini uppá
hendur hennara.
48 Og eg boygdi niður høvur
mítt, og tilbað HARRAN, og væl-
signaði HARRAN Guð meistara
míns Ábrahams, sum hevði leitt
meg á hinum rætta vegi at taka
syni hansara dóttur bróður meist-
ara míns.
49 Og nú, um tit vilji fara blíd-
ligani og sannligani við meistara
mínum, sigið mær: og um ikki,
sigið mær; at eg má venda til
hinnar høgru handar, ella til
hinnar vinstru.
50 Tá svaraðu Lában og Bē´-
thû-ĕl og søgdu, Tingið útgong-
ur frá HARRANUM: vit kunnu ikki
tala við teg ringt ella gott.
51 Sí, Rebēkah *er* frammi fyri
tær, tak *hana,* og far, og lat hana
vera vív sonar meistara tíns, eins
og HARRIN hevur talað.
52 Og tað bar á, at tá ið tænari
Ábrahams hoyrdi orð˙ teirra, til-
bað hann HARRAN, *boyggjandi seg
sjálvan* til jarðarinnar.
53 Og tænarin bar fram smúkk-
ur av silvuri, og smúkkur av gulli,
og klædnað, og gav *tey* til Rebēk-
uh: hann gav eisini til bróðurs
hennara og til móður hennara
dýrabær ting.
54 Og teir ótu og drukku, hann
og menninir sum við honum
vóru, og dvaldu alla nátt; og teir
risu upp um morgunin, og hann
segði, Sendið meg avstað til meist-
ara míns.
55 Og bróðir hennara og móð-
ir hennara søgdu, Lat gentuna
verða hjá okkum *nakrar fáar* dag-
ar, í minsta lagi tíggju; eftir tað
skal hon fara.
56 Og hann segði við tey, Hindr-
ið mær ikki, eftirsum at HARRIN
hevur *gjørt* framgangsríkan mín
veg; sendið meg avstað, at eg má
fara til meistara míns.
57 Og tey søgdu, Vit vilja kalla
gentuna, og fregnast av hennara
munni.
58 Og tey kallaðu Rebēkuh, og
søgdu við hana, Vilt tú fara við
hesum manninum? Og hon segði,
Eg vil fara.
59 Og tey sendu avstað Rebēk-
uh systur sína, og fostru hennara,
og tænara Ábrahams, og menn
hansara.
60 Og tey vælsignaðu Rebēkuh,
og søgdu við hana, Tú *ert* systir
okkara, veri tú *móðirin* at túsund-
um av milljónum, og lat sáð títt
taka til ognar portrið hjá teimum
sum hata teir.
61 ¶ Og Rebēkah reistist, og
gentur hennara, og tær riðu uppi
á kamelunum, og fylgdu mann-
inum: og tænarin tók Rebēkuh,
og fór sín veg.
62 Og Ísaak*ur* kom frá vegi
brunnsins Lā-hāĭ´-rŏi; tí hann búði
í suðurlandinum.

63 Og Ísaak*ur* fór út at hugleiða á akrinum um aftanstíðina: og hann lyfti upp eygum sínum, og sá, og sí, kamelarnir komu.

64 Og Rebēkah lyfti upp eygum sínum, og tá ið hon sá Ísaak, lætti hon *sær* av kamelinum.

65 Tí at hon *hevði* sagt við tænaran, Hvør maður *er* hesin sum gongur á akrinum til at møta okkum? Og tænarin *hevði* sagt, Tað *er* meistari mín: hon tessvegna tók eitt slør, og dekkaði seg.

66 Og tænarin segði Ísaaki øll ting sum hann hevði gjørt.

67 Og Ísaak*ur* førdi hana inn í tjald Sáruh, móður sínar, og tók Rebēkuh, og hon gjørdist kona hansara; og hann elskaði hana: og Ísaak*ur* varð uggaður eftir *deyða* móður sínar.

KAPITUL 25

TÁ tók Ábraham *sær* aftur konu, og hennara navn *var* Kĕ-tū´-râh.

2 Og hon føddi honum Zimran, og Jŏk´-sjăn, og Mē´-dăn, og Mĭ´-dī-ăn, og Ĭsj´-bāk, og Sjū´-âh.

3 Og Jŏk´-sjăn gat Sjē´-bă, og Dē´-dăn. Og synir Dē´-dăn-s vóru Ăssj-ū´-rĭm, og Lē´-tû-sjĭm, og Lē´-ûm-mĭm.

4 Og synir Mĭ´-dī-ăn-s; Ē´-phâh, og Ē´-phĕr, og Há´-nŏch, og Ā´-bĭ-dă, og Ēl´-dâ-âh. Allir hesir *vóru* børnini hjá Kĕ-tū´-rūh.

5 ¶ Og Ábraham gav alt sum hann hevði at Ísaaki.

6 Men sonunum hjá medkonunum, sum Ábraham hevði, gav Ábraham gávur, og sendi teir avstað frá Ísaaki, syni sínum, meðan hann enn livdi, eystureftir, at eysturlandinum.

7 Og hetta *eru* dagarnir av árunum av lívi Ábrahams, sum hann livdi, eitt hundrað og trísinstjúgu og fimtan ár.

8 Tá gav Ábraham upp andan, og doyði í einum góðum, gomlum aldri, ein gamalur maður, og mettur *av árum;* og varð savnaður til fólks síns.

9 Og hansara synir, Ísaak*ur* og Ísj´-mâ-ĕl, jarðaðu hann í Măch-pē´-lâh helli, í akri Ē´-phrŏn-s, sonar Zŏ´-hâr-s Hittita, sum *er* frammanfyri Măm´-rê;

10 Tí akrinum sum Ábraham keypti av sonum Heths: har varð Ábraham jarðaður, og Sárah, kona hansara.

11 ¶ Og tað bar á eftir deyða Ábrahams, at Guð vælsignaði son hansara, Ísaak; og Ísaak*ur* dvaldist við brunnin Lā-hâĭ´-rôĭ.

12 ¶ Nú, hetta *eru* ættirnar hjá Ísj´-mâ-ĕl-i, syni Ábrahams, hvønn Há´-gâr, hin Egyptiska, terna Sáruh, føddi Ábrahami:

13 Og hesi *eru* nøvnini hjá sonum Ísj´-mâ-ĕl-s, eftir nøvnum teirra, samsvarandi við ættir teirra: hin fyrstiføddi hjá Ísj´-mâ-ĕl-i, Nĕ-bā´-jŏth; og Kē´-dăr, og Ăd´-bē´el, og Mĭb´-săm,

14 Og Mĭsj´-mă, og Dū´-mâh, og Măs´-să,

15 Há´-dâr, og Tē´-mă, Jē´-tûr, Ná´-phĭsj, og Kē´-dĕ-mâh:

16 Hesir *eru* synir Ísj´-mâ-ĕl-s, og hesi *eru* nøvn teirra, eftir býum teirra, og eftir slottum teirra; tólv prinsar samsvarandi við tjóðir teirra.

17 Og hetta *eru* árini av lívi Ísj´-mâ-ĕl-s, eitt hundrað og tríati og sjey ár: og hann gav upp andan og doyði, og varð savnaður at fólki sínum.

18 Og teir dvaldust frá Há´-vĭlăh at Sjūr, tað *er* frammanfyri Egyptalandi, sum tú fert ímóti Assýriu: *og* hann doyði í nærveruni av øllum brøðrum sínum.

19 ¶ Og hetta *eru* ættirnar hjá Ísaaki, syni Ábrahams: Ábraham gat Ísaak:

20 Og Ísaak*ur* var fjøruti ára gamalur, tá ið hann tók Rebēkuh

til konu, dóttur Bē′-thû-ēl-s hins Sýriska úr Pá′-dăn-ár′-ăm, systirin hjá Lábani tí Sýriska.

21 Og Ísaak*ur* bønaði HARRAN fyri konu sína, av tí at hon *var* óburin: og HARRIN varð bønaður av honum, og Rebēkah, kona hansara, ól fram.

22 Og børnini kempaðu saman innan í henni; og hon segði, Um *tað veri* so, hví *eri* eg soleiðis? Og hon fór at fregna av HARRANUM.

23 Og HARRIN segði við hana, Tvær tjóðir *eru* í móðurlívi tínum, og tvey háttarløg av fólki skulu verða skild frá innangoymslum tínum; og *tað ēina* fólkið skal vera sterkari enn *hītt* fólkið; og hin eldri skal tæna tí yngra.

24 ¶ Og tá ið hennara dagar til at verða útfríað vórðu uppfyltir, sí, *tá vóru* tvíburðar í móðurlívi hennara.

25 Og hin fyrsti kom út reyður, út um alt líka *sum* eitt loðið klæði, og tey kallaðu navn hansara Esav.

26 Og eftir tað kom bróðir hansara út, og hond hansara tók hald á hæli Esavs; og navn hansara varð kallað Jákob: og Ísaak*ur* *var* trísinstjúgu ára gamalur, tá ið hon føddi teir.

27 Og dreingirnir vuksu: og Esav var ein kønur veiðimaður, ein maður akursins; og Jákob *var* ein slættarmaður, dvøljandi í tjøldum.

28 Og Ísaak*ur* elskaði Esav, av tí at hann át av villibráð *hansara:* men Rebēkah elskaði Jákob.

29 ¶ Og Jákob seyð súpan: og Esav kom frá akrinum, og hann *var* ørmaktaður:

30 Og Esav segði til Jákobs, Føð meg, eg biði teg, við hasi somu reyðu *súpan;* tí at eg *eri* ørmaktaður: tí varð navn hansara kallað Ē′-dóm.

31 Og Jákob segði, Sel mær henda dag tín burðarrætt.

32 Og Esav segði, Sí, eg standi til at doyggja: og hvat gagn skal hesin burðarrættur gera fyri mær?

33 Og Jákob segði, Svør fyri mær henda dag; og hann svór honum: og hann seldi sín burðarrætt at Jákobi.

34 So gav Jákob Esavi breyð og súpan og flatbønir; og hann át og drakk, og reis upp, og fór sín veg: soleiðis vanvirdi Esav *sín* burðarrætt.

KAPITUL 26

OG tað var ein hungursneyð í landinum, umframt ta fyrstu hungursneyðina, sum var á døgum Ábrahams. Og Ísaak*ur* fór at Â-bī′-mê-lēch-i, kongi Philistanna, at Gē′-râr.

2 Og HARRIN birtist honum, og segði, Far ikki niður í Egyptaland; búgv í landinum sum eg skal siga tær um:

3 Útisit í hesum landinum, og eg vil vera við tær, og vil vælsigna teg; tí at tær, og sáði tínum, vil eg geva øll hesi lond, og eg vil útinna eiðin sum eg svór at Ábrahami, faðir tínum;

4 Og eg vil fáa sáð títt at margfaldast sum stjørnur himins, og eg vil geva sáði tínum øll hesi lond; og í sáði tínum skulu allar tjóðir jarðarinnar verða vælsignaðar;

5 Av tí at Ábraham lýddi rødd mína, og helt mína álegging, míni boð, mínar ásetingar, og mínar lógir.

6 ¶ Og Ísaak*ur* dvaldist í Gē′-râr:

7 Og menninir av plássinum spurdu *hann* um konu hansara; og hann segði, Hon *er* systir mín: tí at hann óttaðist at siga, *Hon er* kona mín; at ikki, *segði hann,* menninir av tí plássinum skuldu dripið meg fyri Rebēkuh; av tí at hon *var* vøkur á at líta.

8 Og tað bar á, tá ið hann hevði verið har eina langa tíð, at Â-bī′-mê-lēch, kongur Philistanna,

hugdi út við ein glugga, og sá, og sí, Ísaak*ur* fjasaðist við Rebēkuh, konu sína.

9 Og Â-bī´-mê-lēch kallaði Ísaak, og segði, Sí, við vissu *er* hon kona tín: og hvussu segðirt tú, Hon *er* systir mín? Og Ísaak*ur* segði við hann, Av tí at eg segði, Bara ikki eg doyggi fyri hana.

10 Og Â-bī´-mê-lēch segði, Hvat *er* hetta tú hevurt gjørt at okkum? ēin av fólkinum kundi lættligani havt ligið við konu tíni, og tú hevðirt havt ført skyldugleika uppá okkum.

11 Og Â-bī´-mê-lēch álegði øllum fólki *sínum,* sigandi, Hann, sum nemur henda mann, ella konu hansara, skal vissuliga verða tikin av lívi.

12 Síðan sáaði Ísaak*ur* í tí landinum, og móttók í tí sama árinum hundraðfalt: og HARRIN vælsignaði hann.

13 Og maðurin vaks mikil, og gekk fram, og vaks, inntil hann gjørdist avbera mikil:

14 Tí at hann hevði ogn av smáfæafylgjum, og ogn av stórfæafylgjum, og mikla goymslu av tænarum: og Philistarnir øvundaðu hann.

15 Tí at allir brunnarnir, sum tænararnir hjá faðir hansara høvdu grivið á døgum Ábrahams, faðirs hansara, Philistarnir høvdu tipt teir, og fylt teir við jørð.

16 Og Â-bī´-mê-lēch segði við Ísaak, Far frá okkum; tí at tú ert nógv mektigari enn vit.

17 ¶ Og Ísaak*ur* fór avstað haðani, og sló upp tjald sítt í dali Gē´-râr-s, og dvaldist har.

18 Og Ísaak*ur* gróv aftur brunnarnar av vatni, sum teir høvdu grivið á døgum Ábrahams, faðirs hansara; tí at Philistarnir høvdu tipt teir eftir deyða Ábrahams: og hann kallaði nøvn teirra eftir nøvnunum, við hvørjum faðir hansara hevði kallað teir.

19 Og tænarar Ísaaks gróvu í dalinum, og funnu har ein brunn av vellandi vatni.

20 Og fæhirðar Gē´-râr-s stríddust við fæhirðar Ísaaks, sigandi, Vatnið *er* okkara: og hann kallaði navnið á brunninum Ē´-sĕk; av tí at teir stríddust við hann.

21 Og teir gróvu ein annan brunn, og stríddust yvir hann eisini: og hann kallaði navnið á honum Sĭt´-nâh.

22 Og hann burtflutti haðani frá, og gróv ein annan brunn; og yvir hann stríddust teir ikki: og hann kallaði navnið á honum Rē´-hō-bōth; og hann segði, Tí at nú hevur HARRIN gjørt rúm til okkara, og vit skulu vera ávakstasamir í landinum.

23 Og hann fór niðan haðani frá til Bēēr´-sjē-bŭ.

24 Og HARRIN birtist honum ta somu náttina, og segði, Eg *eri* Guð Ábrahams, faðirs tíns: óttast ikki, tí at eg *eri* við tær, og vil vælsigna teg, og margfalda sáð títt fyri Ábrahams, tænara míns, skuld.

25 Og hann bygdi eitt altar har, og kallaði uppá navn HARRANS, og sló upp tjald sítt har: og har gróvu tænarar Ísaaks ein brunn.

26 ¶ Tá fór Â-bī´-mê-lēch til hansara frá Gē´-râr, og Ă-hŭz´-zăth, ēin av vinum hansara, og Phī´-chŏl, hin fremsti høvuðsmaðurin av heri hansara.

27 Og Ísaak*ur* segði við teir, Hvørsvegna koma tit til mín, við tað at tit hata meg, og hava sent meg avstað frá tykkum?

28 Og teir søgdu, Vit sóu vissuliga, at HARRIN var við tær: og vit søgdu, Lat tað nú vera ein eiður ámilli okkara, *enntá* okkara og tín ámillum, og latum okkum gera ein sáttmála við teg;

29 At tú vilt einkið mein gera okkum, eins og vit hava ikki nortið teg, og eins og vit hava gjørt

tær einkið uttan gott, og hava sent teg avstað í friði: tú *ert* nú hin vælsignaði HARRANS.

30 Og hann gjørdi teimum eina veitslu, og teir ótu og drukku.

31 Og teir risu upp í góðari tíð um morgunin, og svóru hvør fyri øðrum: og Ísaak*ur* sendi teir avstað, og teir fóru avstað frá honum í friði.

32 Og tað bar á hin sama dagin, at tænarar Ísaaks komu, og søgdu honum viðvíkjandi brunninum sum teir høvdu grivið, og søgdu við hann, Vit hava funnið vatn.

33 Og hann kallaði hann Sjē´-bâh: tí *er* navnið á staðinum Bēēr´-sjē-bă at hesum degi.

34 ¶ Og Esav var fjøruti ára gamalur, tá ið hann tók til ektakonu Judith, dóttur Bēēr´-ī-s Hittita; og Bá´-sjē-măth, dóttur Ē´-lŏn-s Hittita:

35 Hvørjar vóru ein hugarkvøl at Ísaaki og fyri Rebēkuh.

KAPITUL 27

OG tað bar á, at tá ið Ísaak*ur* var gamalur, og eygu hansara vóru kám, so at hann ei kundi sjá, kallaði hann Esav, sín elsta son, og segði við hann, Sonur mín: og hann segði við hann, Sí, *her eri* eg.

2 Og hann segði, Sí nú, eg eri gamalur, og veit ikki dag deyða míns:

3 Nú tessvegna, tak, eg biði teg, vápn tíni, tín ørvahúsa og boga tín, og far út til akurin, og tak mær *einahvørja* villibráð;

4 Og ger mær smakksaman mat, slíkan sum eg elski, og kom við *honum* til mín, at eg má eta; at sál mín má vælsigna teg, áðrenn eg doyggi.

5 Og Rebēkah hoyrdi tá ið Ísaak*ur* talaði til sonar síns Esavs. Og Esav fór til akurin at veiða villibráð, *og* at koma við *henni*.

6 ¶ Og Rebēkah talaði við Jákob, son sín, sigandi, Sí, eg hoyrdi faðir tín tala við Esav, bróðir tín, sigandi,

7 Ber mær *einahvørja* villibráð, og ger mær smakksaman mat, at eg má eta, og vælsigna teg frammi fyri HARRANUM, áðrenn deyða mín.

8 Nú tessvegna, sonur mín, lýð rødd mína, samsvarandi við tað sum eg skipi tær.

9 Far nú til smáfæafylgið, og heinta mær haðani frá tvey góð lomb av geitunum; og eg vil gera tey *til* smakksaman mat til faðir tín, slíkan sum hann elskar:

10 Og tú skalt bera *hann* til faðir tín, at hann má eta, og at hann má vælsigna teg, áðrenn deyða sín.

11 Og Jákob segði til Rebēkuh, móður sína, Sí, Esav, bróðir mín, *er* ein loðin maður, og eg *eri* ein mjúkur maður:

12 Mín faðir møguligvís vil føla meg, og eg skal tykjast fyri honum sum ein teipari; og eg skal leiða eina banning omanyvir meg, og ikki eina signing.

13 Og móðir hansara segði við hann, Uppiá mær *veri* banning tín, sonur mín: einans lýð mína rødd, og far *og* heinta mær *tey*.

14 Og hann fór, og heintaði, og bar *tey* til móður sína: og móðir hansara gjørdi smakksaman mat, slíkan sum faðir hansara elskaði.

15 Og Rebēkah tók stásilig klæðir hjá elsta syni sínum Esavi, sum *vóru* hjá henni í húsinum, og smoygdi tey uppá Jákob, yngra son sín:

16 Og hon koyrdi skinnini av lombunum hjá geitunum uppá hendur hansara, og uppá tað mjúka av hálsi hansara:

17 Og hon gav hin smakksama matin og breyðið, sum hon hevði tilreitt, inn í hondina á syni sínum Jákobi.

18 ¶ Og hann kom at faðir sínum, og segði, Mín faðir: og hann segði, Her *eri* eg; hvør *ert* tú, sonur mín?

19 Og Jákob segði við faðir sín, Eg *eri* Esav, tín frumborni; eg havi gjørt samsvarandi sum tú beyðst mær: reis *teg,* eg biði teg, setst og et av villibráð míni, at sál tín má vælsigna meg.

20 Og Ísaak*ur* segði við son sín, Hvussu *er tað,* at tú hevurt funnið *hana* so snarligani, sonur mín? Og hann segði, Av tí at HARRIN Guð tín førdi *hana* til mín.

21 Og Ísaak*ur* segði við Jákob, Kom nær, eg biði teg, at eg má føla teg, sonur mín, hvørt tú *veri teg* sjálvasti sonur mín Esav, ella ikki.

22 Og Jákob fór nær at Ísaaki, faðir sínum; og hann føldi hann, og segði, Røddin *er* røddin hjá Jákobi, men hendurnar *eru* hendurnar hjá Esavi.

23 Og hann greinaði hann ikki, av tí at hendur hansara vóru lodnar, sum hendurnar hjá bróður hansara, Esavi: so hann vælsignaði hann.

24 Og hann segði, *Ert* tú sjálvasti sonur mín Esav? Og hann segði, Eg *eri.*

25 Og hann segði, Ber *hana* nær til mín, og eg vil eta av villibráð sonar míns, at sál mín má vælsigna teg. Og hann bar *hana* nær til hansara, og hann át: og hann bar honum vín, og hann drakk.

26 Og hansara faðir, Ísaak*ur,* segði við hann, Kom nær nú, og kyss meg, sonur mín.

27 Og hann kom nær, og kysti hann: og hann luktaði angan av klæði hansara, og vælsignaði hann, og segði, Sí, angin av syni mínum *er* sum angin av einum akri, sum HARRIN hevur vælsignað:

28 Tí gevi Guð tær av døggi himins, og fiti jarðarinnar, og ríviligt av korni og víni:

29 Tæni fólk tær, og lúti tjóðir niður fyri tær: ver harri yvir brøðrum tínum, og synir móður tínar lúti niður fyri tær: bannaður *veri* hvør tann sum bannar teg, og vælsignaður *veri* hann sum vælsignar teg.

30 ¶ Og tað bar á, so skjótt sum Ísaak*ur* hevði gjørt *seg* lidnan við at vælsigna Jákob, og Jákob enn valla var farin út frá nærveru Ísaaks, faðirs síns, at Esav, bróðir hansara, kom inn frá veiðan síni.

31 Og hann eisini hevði gjørt smakksaman mat, og bar hann at faðir sínum, og segði við faðir sín, Lat faðir mín reisast, og eta av villibráð sonar síns, at sál tín má vælsigna meg.

32 Og Ísaak*ur,* faðir hansara, segði við hann, Hvør *ert* tú? Og hann segði, Eg *eri* sonur tín, tín frumborni, Esav.

33 Og Ísaak*ur* nøtraði sera ovurhondsligani, og segði, Hvør? hvar *er* hann sum hevur tikið villibráð, og borið mær *hana,* og eg havi etið av øllum, áðrenn tú komst, og havi vælsignað hann? ja, *og* hann skal vera vælsignaður.

34 Og tá ið Esav hoyrdi orðini hjá faðir sínum, rópaði hann við einum miklum og avbera beiskum rópi, og segði við faðir sín, Vælsigna meg, *enntá* meg eisini, O faðir mín.

35 Og hann segði, Bróðir tín kom við sniðfundni, og hevur tikið burtur signing tína.

36 Og hann segði, Er ikki hann rættligani nevndur Jákob? tí at hann hevur teipað meg hesar tvær ferðir: hann tók burtur burðarrætt mín; og sí, nú hevur hann tikið burtur signing mína. Og hann segði, Hevurt tú ikki lagt niðurfyri eina signing til mín?

37 Og Ísaak*ur* svaraði og segði

við Esav, Sí, eg havi gjørt hann *til* harra tín, og allar hansara bræður havi eg givið til hansara til tænarar; og við korni og víni havi eg nørt hann: og hvat skal eg nú gera tær, sonur mín?

38 Og Esav segði við faðir sín, Hevurt tú bert eina signing, faðir mín? vælsigna meg, *enntá* meg eisini, O faðir mín. Og Esav lyfti upp rødd sína, og græt.

39 Og Ísaak*ur*, faðir hansara, svaraði og segði við hann, Sí, tín bústaður skal vera fiti jarðarinnar, og av døggi himins úr erva;

40 Og við tínum svørði skalt tú liva, og skalt tæna bróður tínum; og tað skal bera á, tá ið tú skalt hava harradømið, at tú skalt bróta ok hansara uttan av hálsi tínum.

41 ¶ Og Esav hataði Jákob uppá grund av signingini, hvarvið faðir hansara vælsignaði hann: og Esav segði í hjarta sínum, Harmingardagarnir yvir faðir mín eru fyri hond; tá vil eg bana bróður mínum Jákobi.

42 Og hesi orðini hjá Esavi, eldra syni hennara, vórðu søgd fyri Rebēkuh: og hon sendi og kallaði Jákob, yngra son sín, og segði við hann, Sí, bróðir tín Esav, hvat varðar teg, uggar seg, *ætlandi* at drepa teg.

43 Nú tessvegna, sonur mín, lýð rødd mína; og reis *teg, og* flýggja tú til Lábans, bróðurs míns, til Hár′-ăn;

44 Og steðga hjá honum nakrar fáar dagar, inntil øðin hjá bróður tínum vendi burt;

45 Inntil firtnin hjá bróður tínum vendi burtur frá tær, og hann gloymi *tað* sum tú hevurt gjørt við hann: tá vil eg senda, og heinta teg haðani frá: hví skuldi eg verðið rænd eisini fyri tykkum báðar í ēinum degi?

46 Og Rebēkah segði við Ísaak, Eg eri móð av mínum lívi uppá grund av døtrum Heths: um Jákob taki eina konu av døtrum Heths, slíka sum hesar *sum eru* av døtrum landsins, hvat gott skal lív mítt gera mær?

KAPITUL 28

OG Ísaak*ur* kallaði Jákob, og vælsignaði hann, og álegði honum, og segði við hann, Tú skalt ikki taka konu av døtrum Cānaans.

2 Reis *teg,* far til Pá′-dăn-ár′-ăm, til húsar Bē′-thû-ĕl-s, faðirs móður tínar; og tak tær konu haðani frá av døtrum Lábans, móðurbróður tíns.

3 Og Guð Almáttugi vælsigni teg, og geri teg ávakstamiklan, og margfaldi teg, at tú mást verða ein fjøld av fólki;

4 Og gevi tær signing Ábrahams, til tín, og til sáðs tíns við tær; at tú mást arva landið, í hvørjum tú ert ein fremmandur, hvørt Guð gav at Ábrahami.

5 Og Ísaak*ur* sendi avstað Jákob: og hann fór til Pá′-dăn-ár′-ăm, at Lábani, syni Bē′-thû-ĕl-s hins Sýriska, bróður Rebēkuh, móður Jákobs og Esavs.

6 ¶ Tá ið Esav sá, at Ísaak*ur* hevði vælsignað Jákob, og sent hann til Pá′-dăn-ár′-ăm, at taka sær konu haðani frá; og at, sum hann vælsignaði hann, gav hann honum eina álegging, sigandi, Tú skalt ikki taka konu av døtrum Cānaans;

7 Og at Jákob lýddi faðir sín og móður sína, og var farin til Pá′-dăn-ár′-ăm;

8 Og Esav, síggjandi at døtur Cānaans toknaðust ikki Ísaaki, faðir sínum;

9 Tá fór Esav at Ísj′-mâ-ĕl-i, og tók *aftur*at konunum sum hann hevði, Má′-hâ-lăth, dóttur Ísj′-mâ-ĕl-s Ábrahams sonar, systur Nĕ-bā′-jōth-s, til at vera kona hansara.

10 ¶ Og Jákob fór út frá Bēēr′-sjĕ-bŭ, og fór ímóti Hár′-ăn.

11 Og hann lendi uppiá einum ávísum plássi, og dvaldi har *í* alla nátt, av tí at sólin var sett; og hann tók av steinunum av tí plássinum, og legði *teir til* koddar sínar, og legðist niður á tí plássinum at sova.

12 Og hann droymdi, og sí ein stigi, stillaður upp á jørðina, og toppurin á honum rakk til himins: og sí Guðs einglar stígandi niður og stígandi upp á honum.

13 Og sí, HARRIN stóð uppiyvir honum, og segði, Eg *eri* HARRIN Guð Ábrahams, faðirs tíns, og Guð Ísaaks: landið, hvará tú liggurt, til tín vil eg geva tað, og til sáðs tíns;

14 Og títt sáð skal verða sum dust jarðarinnar, og tú skalt breiða *teg* útumkring til vesturs, og til eysturs, og til norðurs, og til suðurs: og í tær og í tínum sáði skulu allar familjur jarðarinnar verða vælsignaðar.

15 Og sí, eg *eri* við tær, og vil varðveita teg í øllum *plássum*, hvagar tú fert, og vil føra teg aftur inn í hetta land; tí at eg vil ikki fara frá tær, inntil eg havi gjørt *tað* sum eg havi talað til tín um.

16 ¶ Og Jákob vaknaði úr svøvni sínum, og hann segði, Vissuliga, HARRIN er á hesum staði; og eg vitsti *tað* ikki.

17 Og hann var ræddur, og segði, Hvør øtiligt *er* hetta plass! hetta *er* einkið annað enn hús Guðs, og hetta *er* portur himins.

18 Og Jákob reis upp árla um morgunin, og tók steinin, sum hann hevði lagt *til* koddar sínar, og setti hann upp *til* eina súlu, og helti olju uppá toppin á henni.

19 Og hann kallaði navnið á tí plássinum Beth-el: men navnið á tí staðinum *varð kallað* Lúz í fyrstani.

20 Og Jákob strongdi eitt heiti, sigandi, Um Guð vilji vera við mær, og vilji varðveita meg á hesum vegi sum eg fari, og vilji geva mær breyð at eta, og klædnað at fara í,

21 So at eg komi aftur til húsar faðirs míns í friði; so skal HARRIN vera Guð mín:

22 Og hesin steinurin, sum eg havi sett *til* eina súlu, skal vera hús Guðs: og av øllum, sum tú skalt geva mær, vil eg vissuliga geva tíggundar*part*in at tær.

KAPITUL 29

TÁ fór Jákob á ferð síni, og kom inn í landið hjá fólki eystursins.

2 Og hann hugdi, og sí, ein brunnur á akrinum, og sí, har *vóru* trý fylgir av seyði liggjandi hjá honum; tí at úr tí brunninum vatnaðu teir fylgini: og ein mikil steinur *var* uppiá munnanum á brunninum.

3 Og hagar vóru øll fylgini savnaði: og teir rullaðu steinin frá munnanum á brunninum, og vatnaðu seyðin, og løgdu steinin aftur uppá munnan á brunninum, á plass sítt.

4 Og Jákob segði við teir, Brøður mínir, hvaðan *veri* tit? Og teir søgdu, Úr Hár´-ān *eru* vit.

5 Og hann segði við teir, Kenna tit Lában, son Náhors? Og teir søgdu, Vit kenna *hann*.

6 Og hann segði við teir, *Veit* honum væl *við?* Og teir søgdu, *Honum veit* væl *við:* og sí, Rachel, dóttir hansara, kemur við seyðinum.

7 Og hann segði, Sí, *tað er* enn hádagur, eiheldur *er tað* tíð til at fenaðurin skuldi verðið savnaður saman: vatnið tit seyðin, og farið *og* føðið *teir*.

8 Og teir søgdu, Vit kunnu ikki, inntil øll fylgini verði savnaði saman, og *til* teir rulla steinin frá munnanum á brunninum; tá vatna vit seyðin.

9 ¶ Og meðan hann enn talaði

við teir, kom Rachel við seyði faðirs síns: tí at hon passaði teir.
10 Og tað bar á, tá ið Jákob sá Rachel, dóttur Lábans, móðurbróður síns, og seyðin hjá Lábani, móðurbróður sínum, at Jákob fór nær, og rullaði steinin frá munnanum á brunninum, og vatnaði fylgið hjá Lábani, móðurbróður sínum.
11 Og Jákob kysti Rachel, og lyfti upp rødd sína, og græt.
12 Og Jákob taldi Racheli, at hann *var* faðirbróðir hennara, og at hann *var* sonur Rebēkuh: og hon rann og taldi faðir sínum.
13 Og tað bar á, tá ið Lában hoyrdi tíðindini um Jákob, son systur sínar, at hann rann at hitta hann, og umfevndi hann, og kysti hann, og førdi hann til húss síns. Og hann taldi Lábani allar hesar lutir.
14 Og Lában segði til hansara, Vissuliga, tú *ert* bein mítt og kjøt mítt. Og hann varð hjá honum eitt mánaðar skeið.
15 ¶ Og Lában segði við Jákob, Av tí at tú *ert* bróðir mín, skuldirt tú tessvegna tænt mær fyri einkið? sig mær, hvat *skal* løn tín *vera?*
16 Og Lában hevði tvær døtur: navnið hjá tí eldru *var* Leah, og navnið hjá tí yngru *var* Rachel.
17 Leah *var* veikoygd; men Rachel var vøkur og sá gott út.
18 Og Jákob elskaði Rachel; og segði, Eg vil tæna tær sjey ár fyri Rachel, yngru dóttur tína.
19 Og Lában segði, *Tað er* betri at eg gevi hana til tín, enn at eg skuldi givið hana til ein annan mann: verð hjá mær.
20 Og Jákob tænti sjey ár fyri Rachel; og tey tóktust honum *bert* nakrir fáir dagar, fyri kærleikan *sum* hann hevði til hennara.
21 ¶ Og Jákob segði við Lában, Gev *mær* konu mína, tí at dagar mínir eru uppfyltir, at eg má fara inn at henni.
22 Og Lában savnaði saman allar menninar av plássinum, og gjørdi eina veitslu.
23 Og tað bar á um kvøldið, at hann tók Leuh, dóttur sína, og førdi hana til hansara; og hann fór inn at henni.
24 Og Lában gav dóttur síni Leuh, Zilpuh, ternu sína, *til* eina tænastumoyggj.
25 Og tað bar á, at um morgunin, sí, tað *var* Leah: og hann segði til Lábans, Hvat *er* hetta tú hevurt gjørt mær? tænti eg ikki hjá tær fyri Rachel? hvørsvegna hevurt tú tá snýtt meg?
26 Og Lában segði, Tað má ikki svá verða gjørt í landi várum, at geva ta yngru áðrenn ta fyrstuføddu.
27 Uppfyll hennara viku, og vit vilja geva tær hesa eisini fyri ta tænastu, sum tú skalt tæna hjá mær enn sjey onnur ár.
28 Og Jákob so gjørdi, og fullførdi hennara viku: og hann gav honum Rachel, dóttur sína, til konu eisini.
29 Og Lában gav til Rachelar, dóttur sínar, Bïl´-hūh, tænastumoy sína, til at vera terna hennara.
30 Og hann fór inn eisini at Racheli, og hann elskaði eisini Rachel meira enn Leuh, og tænti hjá honum enn sjey onnur ár.
31 ¶ Og tá ið HARRIN sá, at Leah *varð* hatað, upplæt hann hennara móðurlív: men Rachel *var* óburin.
32 Og Leah ól fram, og føddi ein son, og hon kallaði navn hansara Reūben: tí at hon segði, Vissuliga, HARRIN hevur hugt uppá nívd mína; tí vil maður mín nú elska meg.
33 Og hon ól fram aftur, og føddi ein son; og segði, Av tí at HARRIN hevur hoyrt, at eg *varð* hatað, tí hevur hann givið mær henda *sonin* við: og hon kallaði navn hansara Símeon.

34 Og hon gat aftur, og føddi ein son; og segði, Nú hesa ferðina vil maður mín verða sameintur at mær, av tí at eg havi føtt honum tríggjar synir: tí varð navn hansara kallað Levi.

35 Og hon gat aftur, og føddi ein son: og hon segði, Nú vil eg prísa HARRANUM: tí kallaði hon navn hansara Judah; og lætti *av* at eiga.

KAPITUL 30

OG tá ið Rachel sá, at hon føddi Jákobi eingi børn, øvundaði Rachel systur sína; og segði við Jákob, Gev mær børn, ella annars doyggi eg.

2 Og Jákobs firtni varð kynd ímóti Racheli: og hann segði, *Eri* eg í stað Guðs, sum hevur afturhildið frá tær ávøkstin av móðurlívinum?

3 Og hon segði, Sí mína ternu, Bil´-hŭh, far inn at henni; og hon skal føða uppá míni knø, at eg má eisini hava børn av henni.

4 Og hon gav honum Bil´-hŭh, tænastumoyggj sína, til konu: og Jákob fór inn at henni.

5 Og Bil´-hâh ól fram, og føddi Jákobi ein son.

6 Og Rachel segði, Guð hevur dømt meg, og hevur eisini hoyrt mína rødd, og hevur givið mær ein son: tí kallaði hon navn hansara Dán.

7 Og Bil´-hâh, terna Rachelar, ól fram aftur, og føddi Jákobi ein næsta son.

8 Og Rachel segði, Við miklum glímingum havi eg glímt við systur mína, og eg havi havt yvirvág: og hon kallaði navn hansara Nâph´-tâ-lī.

9 Tá ið Leah sá, at hon var lætt *av* at eiga, tók hon Zilpuh, ternu sína, og gav Jákobi hana til konu.

10 Og Zilpah, terna Leuh, føddi Jákobi ein son.

11 Og Leah segði, Eitt herlið kemur: og hon kallaði navn hansara Gád.

12 Og Zilpah, terna Leuh, føddi Jákobi ein næsta son.

13 Og Leah segði, Fegin eri eg, tí at døtrarnar vilja vælsignaða meg kalla: og hon kallaði navn hansara Ásjer.

14 ¶ Og Reûben fór í hveitiskurðardøgunum, og fann ástareplir í akrinum, og bar móður síni, Leuh, tey. Tá segði Rachel við Leuh, Gev mær, eg biði teg, av ástareplum sonar tíns.

15 Og hon segði við hana, *Er tað* ein lítil søk, at tú hevurt tikið mann mín? og vildirt tú tikið burtur ástareplir sonar míns við? Og Rachel segði, Tí skal hann liggja hjá tær í nátt fyri ástareplir sonar tíns.

16 Og Jákob kom uttan av akrinum um kvøldið, og Leah fór út at møta honum, og segði, Tú mást koma inn at mær; tí at vissuliga havi eg leigað teg við ástareplum sonar míns. Og hann lá hjá henni ta náttina.

17 Og Guð lýddi á Leuh, og hon ól fram, og føddi Jákobi hin fimta sonin.

18 Og Leah segði, Guð hevur givið mær løn mína, av tí at eg havi givið ternu mína til mans míns: og hon kallaði navn hansara Ís´-să-châr.

19 Og Leah ól fram aftur, og føddi Jákobi hin sætta sonin.

20 Og Leah segði, Guð hevur yvirklætt meg *við* eini góðari heimanfylgju; nú vil maður mín búgva hjá mær, av tí at eg havi føtt honum seks synir: og hon kallaði navn hansara Zĕ´-bŭ-lŏn.

21 Og síðan føddi hon eina dóttur, og kallaði navn hennara Dinah.

22 ¶ Og Guð mintist til Rachelar, og Guð lýddi á hana, og upplæt hennara móðurlív.

23 Og hon ól fram, og føddi

ein son; og segði, Guð hevur tikið burtur skomm mína:

24 Og hon kallaði navn hansara Jóseph; og segði, HARRIN skal leggja aftrat til mín ein annan son.

25 ¶ Og tað bar á, tá ið Rachel hevði føtt Jóseph, at Jákob segði við Lában, Send meg avstað, at eg má fara til egna pláss mítt, og til land mítt.

26 Gev *mær* konur mínar og børn míni, fyri hvørji eg havi tænt tær, og lat meg fara: tí at tú veitst mína tænastu, sum eg havi gjørt tær.

27 Og Lában segði við hann, Eg biði teg, um eg havi funnið yndi í eygum tínum, *dvøl: tí at* eg havi lært av roynslu, at HARRIN hevur vælsignað meg fyri tína skyld.

28 Og hann segði, Áset mær løn tína, og eg vil geva *hana*.

29 Og hann segði við hann, Tú veitst hvussu eg havi tænt tær, og hvussu tín fenaður var hjá mær.

30 Tí at *tað var* lítið, sum tú hevðirt, áðrenn eg *kom,* og tað er *nú* økt at eini fjøld; og HARRIN hevur vælsignað teg síðan mína komu: og nú, nær skal eg skaffa fyri mítt egna hús við?

31 Og hann segði, Hvat skal eg geva tær? Og Jákob segði, Tú skalt ikki geva mær nakað: um tú vilt gera hetta tingið fyri meg, vil eg aftur føða *og* passa fylgi títt:

32 Eg vil fara igjøgnum alt títt fylgi í dag, takandi burtur haðani frá allan hin sprøkluta og flekkuta fenaðin, og allan hin brúna fenað seyðanna millum, og hinar flekkutu og sprøklutu geitanna millum: og *av slíkum* skal vera mín løn.

33 So skal mín rættvísi svara fyri meg í tíð*ini* sum koma skal, tá ið tað skal koma til mína løn frammi fyri andliti tínum: hvør tann sum *er* ikki sprøklut og flekkut geitanna millum, og brún seyðanna millum, tað skal verða roknað stolið hjá mær.

34 Og Lában segði, Sí, eg vildi *at* tað mátti verðið samsvarandi við orð títt.

35 Og hann burtflutti tann dagin havrarnar, sum vóru gjørðutir og flekkutir; og allar geitirnar, sum vóru sprøklutar og flekkutar; *og* hvønn tann, sum hevði *nakað* hvítt á sær; og allar hinar brúnu seyðanna millum, og gav *tey* inn í hondina á sonum sínum.

36 Og hann setti tríggja daga ferð ámilli sín sjálvs og Jákobs: og Jákob føddi restina av fylgjum Lábans.

37 ¶ Og Jákob tók sær rør av grønari øsp, og av hasli og kastanju træi; og pilkaði hvítar gjarðir í tey, og fekk tað hvíta *at* sýnast sum *var* í rørunum.

38 Og hann setti rørini, sum hann hevði pilkað, frammanfyri fylgini í rennurnar í vatningartrogini, tá ið fylgini komu at drekka, *fyri* at tey skuldu gitnast, tá ið tey komu at drekka.

39 Og fylgini gitnaðust frammanfyri rørunum, og bóru fram fenað: gjørðutan, sprøklutan, og flekkutan.

40 Og Jákob atskildi lombini, og vendi andlitunum á fylgjunum ímóti hinum gjørðutu, og øllum teimum brúnu í fylginum hjá Lábani; og hann setti síni egnu fylgir fyri seg sjálv, og setti tey ikki at fenaðinum hjá Lábani.

41 Og tað bar á, nærsumhelst *ið* hin sterkari fenaðurin gitnaðist, at Jákob legði rørini frammanfyri eygunum á fenaðinum í rennurnar, at tey mátti gitnast røranna millum.

42 Men tá ið fenaðurin var ússaligur, setti hann *tey* ikki í: so hini ússaligaru vórðu Lábans, og hini sterkaru Jákobs.

43 Og maðurin tók til framúrligani, og hevði nógvan fenað, og tænastumoyggjar, og tænastumenn, og kamelar, og asnar.

KAPITUL 31

OG hann hoyrdi orðini hjá sonunum hjá Lábani, sigandi, Jákob hevur tikið burtur alt sum *var* faðirs okkara; og av *tí,* sum *var* faðirs okkara, hevur hann fingið alla hesa dýrd.

2 Og Jákob skoðaði andlitsbrá Lábans, og sí, tað *var* ikki mótvegis honum sum áður.

3 Og HARRIN segði við Jákob, Vend aftur at landi faðirs tíns, og til ættarfólks tíns; og eg vil vera við tær.

4 Og Jákob sendi og kallaði Rachel og Leuh til akurin at fylgi sínum,

5 Og segði við tær, Eg síggi andlitsbrá faðirs tykkara, at tað *er* ikki mótvegis mær sum áður; men Guð faðirs míns hevur verið við mær.

6 Og tit vita, at við øllum mínum alvi havi eg tænt faðir tykkara.

7 Og faðir tykkara hevur snýtt meg, og broytt mína løn tíggju ferðir; men Guð loyvdi honum ikki at skaða meg.

8 Um hann segði soleiðis, Tey sprøklutu skulu vera løn tín; tá føddi allur fenaðurin sprøklut: og um hann segði soleiðis, Tey gjørðutu skulu vera løn tín; tá føddi allur fenaðurin gjørðut.

9 Svá hevur Guð tikið burtur fenaðin hjá faðir tykkara, og givið *hann* til mín.

10 Og tað bar á við ta tíðina sum fenaðurin gitnaðist, at eg lyfti upp eygum mínum, og sá í einum dreymi, og sí, veðrarnir, sum sprungu uppá fenaðin, *vóru* gjørðutir, sprøklutir, og høglutir.

11 Og Guðs eingil talaði við meg í einum dreymi, *sigandi,* Jákob: Og eg segði, Her *eri* eg.

12 Og hann segði, Lyft upp nú eygum tínum, og siggj, allir veðrarnir, sum springa uppá fenaðin, *eru* gjørðutir, sprøklutir og høglutir: tí at eg havi sæð alt sum Lában ger at tær.

13 Eg *eri* Guð Beth-el-s, har tú salvaðirt súluna, *og* har tú heittirt mær heitstreingi: nú reis *teg,* slepp tær út frá hesum landi, og vend aftur at landi ættarfólks tíns.

14 Og Rachel og Leah svaraðu og søgdu við hann, *Er* enn nakar skamtur, ella arvur, til okkara í húsi faðirs okkara?

15 Verða vit ikki roknaðar av honum fremmandar? tí at hann hevur selt okkum, og hevur heilt uppetið eisini pening okkara.

16 Tí at øll ríkidømini, sum Guð hevur tikið frá faðir okkara, tað *er* okkara, og barna okkara: so nú, hvatsumhelst *ið* Guð hevur sagt við teg, ger.

17 ¶ Tá reis Jákob upp, og setti synir sínar og konur sínar uppá kamelar;

18 Og hann førdi burt allan fenað sín, og alt sítt góðs sum hann hevði fingið, og allan fenaðin av síni fáing sum hann hevði fingið í Pá-dăn-ár-ăm, fyri at fara til Ísaaks, faðirs síns, í landi Cănaans.

19 Og Lában fór at klippa seyði sínum: og Rachel hevði stjolið myndirnar sum *vóru* faðirs hennara.

20 Og Jákob stjólst burtur óvarugt fyri Lábani tí Sýriska, í at hann segði honum ikki at hann flýddi.

21 So hann flýddi við øllum sum hann hevði; og hann reis upp, og fór yvirum ánna, og setti sítt andlit *ímóti* fjallinum Gilead.

22 Og tað varð sagt Lábani á hinum triðja deginum, at Jákob var flýddur.

23 Og hann tók brøður sínar við sær, og elti eftir honum sjey daga ferð; og teir innheintaðu hann á fjallinum Gilead.

24 Og Guð kom til Lában hin Sýriska í einum dreymi um nátt-

ina, og segði við hann, Vara teg, at tú tali ikki til Jákobs, hvørki gott ella ilt.

25 ¶ Tá innheintaði Lában Jákob. Nú, Jákob hevði sligið upp tjald sítt á fjallinum: og Lában, við brøðrum sínum, sló upp á Gileads fjalli.

26 Og Lában segði til Jákobs, Hvat hevurt tú gjørt, at tú hevurt stjolist burtur óvarugt fyri mær, og ført burt mínar døtur, eins og fangar *tiknar* við svørðinum?

27 Hvørsvegna flýddirt tú burtur loyniliga, og stjólst burtur frá mær; og segðirt mær ikki, at eg mátti havt sent teg avstað við gleimi, og við songum, við tamburīn, og við hørpu?

28 Og hevurt ikki loyvt mær at kyssa synir mínar og døtur mínar? tú hevurt nú gjørt fávitskuligani í *soleiðis* at gera.

29 Tað er í mátti handar mínar at gera tykkum mein: men Guð faðirs tykkara talaði til mín gjáranátt*ina,* sigandi, Ver varin, at tú tali ikki til Jákobs, hvørki gott ella ilt.

30 Og nú, *tó at* tú vildirt neyðugt verið farin, av tí at tær sáran leingist eftir húsi faðirs tíns, *tó* hvørsvegna hevurt tú stjolið gudar mínar?

31 Og Jákob svaraði og segði til Lábans, Av tí at eg var ræddur: tí at eg segði, Vera má, *at* tú vildirt taka við valdi døtur tínar frá mær.

32 Hjá hvørjumsumhelst *ið* tú finnurt tínar gudar, lat hann ikki liva: frammi fyri brøðrum okkara greina tú hvat títt *er* hjá mær, og tak *tað* til tín. Tí at Jákob vitsti ikki, at Rachel hevði stjolið teir.

33 Og Lában fór inn í tjald Jákobs, og inn í tjald Leuh, og inn í tjøldini hjá báðum tænastumoyggjunum; men hann fann *teir* ikki. Tá fór hann út úr tjaldi Leuh, og fór inn í tjald Rachelar.

34 Nú, Rachel hevði tikið myndirnar, og lagt tær í reiðskapin hjá kamelunum, og sat uppiá teimum. Og Lában kannaði alt tjaldið, men fann *tær* ikki.

35 Og hon segði til faðirs síns, Lat tað ikki mistokna harra mín, at eg kann ikki rísa upp frammi fyri tær; tí at mær *fer* á kvenna vísi. Og hann leitaði, men fann ikki myndirnar.

36 ¶ Og Jákob varð vreiður, og deildist við Lában: og Jákob ávarpaði og segði til Lábans, Hvat *er* brot mítt? hvør *er* synd mín, at tú hevurt so heitan elt eftir mær?

37 Við tað *at* tú hevurt leitað *um* øll míni ting, hvat hevurt tú funnið av øllum tínum húshalds tingum? set *tað* her frammanfyri brøðrum mínum og brøðrum tínum, at teir mega døma ímilli okkum báðar.

38 Hesi tjúgu ár *havi* eg *verið* hjá tær; tínar ær og tínar geitir hava ikki kastað burt ungar sínar, og veðrarnar av fylgi tínum havi eg ikki etið.

39 Tað, sum varð skrætt *av villdjórum,* førdi eg ikki til tín; eg bar missin av tí; av míni hond kravdirt tú tað, *hvørt tað var* stjolið um dag*in,* ella stjolið um nátt*ina*.

40 *Soleiðis* var eg; um dagin upptærdi turkurin meg, og frostið um nátt*ina;* og mín svøvnur veik frá eygum mínum.

41 Soleiðis havi eg verið tjúgu ár í húsi tínum; eg tænti tær fjúrtan ár fyri døtur tínar tvær, og seks ár fyri fenað tín: og tú hevurt broytt mína løn tíggju ferðir.

42 Uttan Guð faðirs míns, Guð Ábrahams, og Ísaaks ótti, hevði verið við mær, vissuliga hevðirt tú sent meg avstað nú tóm*hent*an. Guð hevur sæð mína nívd og strev handa mína, og hartað *teg* gjáranátt*ina*.

43 ¶ Og Lában svaraði og segði við Jákob, *Hesar* døtur *eru*

mínar døtur, og *hesi* børn *eru* míni børn, og *hesir* fenaðir *eru* mínir fenaðir; og alt, sum tú sært, *er* mítt: og hvat kann eg gera henda dag hesum døtrum mínum, ella teirra børnum sum tær hava føtt?

44 Nú tessvegna, kom tú, latum okkum gera ein sáttmála, eg og tú; og veri hann til eitt vitni ímillum meg og teg.

45 Og Jákob tók ein stein, og setti hann upp *til* eina súlu.

46 Og Jákob segði við brøður sínar, Savnið steinar; og teir tóku steinar, og gjørdu ein varða: og teir ótu har uppiá varðanum.

47 Og Lában kallaði hann Jē´găr-sâ-hâ-dū´-thă: men Jákob kallaði hann Gá´-lēēd.

48 Og Lában segði, Hesin varði *er* eitt vitni ímillum meg og teg henda dag. Tí varð navnið á honum kallað Gá´-lēēd;

49 Og Mizpah; tí at hann segði, HARRIN vaki ímillum meg og teg, tá ið vit eru fráverandi hvør frá øðrum.

50 Um tú skalt níva døtur mínar, ella um tú skalt taka *aðrar* konur umframt døtur mínar, eingin maður *er* við okkum; sí, Guð *er* vitni ímilli mín og tín.

51 Og Lában segði til Jákobs, Síggj henda varða, og síggj *hesa* súlu, sum eg havi laðað ímilli mín og tín;

52 Hesin varði *veri* vitni, og *henda* súla *veri* vitni, at eg vil ikki fara yvir henda varða til tín, og at tú skalt ikki fara yvir henda varða og hesa súlu at mær, til mein.

53 Guð Ábrahams, og Guð Náhors, Guð faðirs teirra, dømi ímilli okkara. Og Jákob svór við ótta faðirs síns Ísaaks.

54 Tá ofraði Jákob sláturoffur uppiá fjallinum, og kallaði brøður sínar at eta breyð: og teir ótu breyð, og dvøldu alla nátt á fjallinum.

55 Og árla um morgunin reis Lában upp, og kysti synir sínar og døtur sínar, og vælsignaði tey: og Lában fór avstað, og vendi aftur at plássi sínum.

KAPITUL 32

OG Jákob fór á vegi sínum, og Guðs einglar møttu honum.

2 Og tá ið Jákob sá teir, segði hann, Hetta *er* herlið Guðs: og hann kallaði navnið á tí plássinum Mă-há´-nă-ĭm.

3 Og Jákob sendi sendisveinar undan sær til Esavs, bróðurs síns, at Sē´-ĭr-s landi, Ē´-dóm-s landi.

4 Og hann skipaði teimum, sigandi, Svá skulu tit tala við harra mín Esav; Tænari tín Jákob sigur svá, Eg havi útisitið hjá Lábani, og dvalt har inntil nú:

5 Og eg havi oksar, og asnar, smáfæafylgir, og tænastusveinar, og tænastukvinnur: og eg havi sent at siga harra mínum frá, at eg má finna náði í eygsjón tíni.

6 ¶ Og sendisveinarnir vendu aftur til Jákobs, sigandi, Vit komu til bróðurs tíns Esavs, og eisini hann kemur *fyri* at møta tær, og fýra hundrað menn við honum.

7 Tá varð Jákob stórliga ræddur og neyðstaddur: og hann atskildi fólkið sum *var* við honum, og smáfæafylgini, og stórfæafylg*ini*, og kamelarnar, í tveir bólkar;

8 Og segði, Um Esav komi til hin ēina flokkin, og slái hann, tá skal hīn flokkurin, sum er eftir, komast undan.

9 ¶ Og Jákob segði, O Guð faðirs míns Ábrahams, og Guð faðirs míns Ísaaks; HARRIN, sum segðirt við meg, Vend aftur at landi tínum, og til ættarfólks tíns, og eg vil fara væl við tær:

10 Eg eri ikki verdigur til tær minstu av øllum miskunnunum, og øllum sannleikanum, sum tú hevurt sýnt at tænara tínum; tí at við mínum stavi fór eg yvirum

hesa Jordan; og nú eri eg vorðin tveir bólkar.

11 Bjarga mær, eg biði teg, frá hond bróðurs míns, frá hond Esavs: tí at eg óttist hann, bara ikki hann vilji koma og slá meg, *og* móðurina við børnunum.

12 Og tú segðirt, Eg vil vissuliga gera tær gott, og gera sáð títt sum sand sævarins, sum kann ei verða upptaldur fyri fjøldleika.

13 ¶ Og hann hevði tilhald har ta somu náttina; og tók av tí, sum kom til handar sínar, eina gávu til Esavs, bróður síns;

14 Tvey hundrað geitir, og tjúgu havrar, tvey hundrað ær, og tjúgu veðrar,

15 Tríati mjólkikamelar við teirra fylum, fjøruti kýr, og tíggju tarvar, tjúgu øsnur, og tíggju folar.

16 Og hann flýggjaði *tey* inn í hendur tænara sína, hvønn flokk fyri teir sjálvar; og segði við tænarar sínar, Farið yvir undan mær, og setið eitt glopp ímilli fylgi og fylgi.

17 Og hann skipaði tí fremsta, sigandi, Tá ið Esav, bróðir mín, møtir tær, og spyr teg, sigandi, Hvørs *ert* tú? og hvagar fert tú? og hvørs *eru* hesi frammanfyri teg?

18 Tá skalt tú siga, *Tey veri* tænara tíns Jákobs; tað *er* ein gáva, send harra mínum Esavi: og sí, eisini hann *er* aftanfyri okkum.

19 Og soleiðis skipaði hann hinum øðrum, og hinum triðja, og øllum sum fylgdu fylgjunum, sigandi, Á henda hátt skulu tit tala við Esav, tá ið tit finna hann.

20 Og sigið tit harafturat, Sí, tænari tín Jákob *er* aftanfyri okkum. Tí at hann segði, Eg vil sissa hann við gávuni sum fer undan mær, og aftaná vil eg sjá andlit hansara; vera má, *at* hann vilji móttaka av mær.

21 So fór gávan yvirum undan honum: og sjálvur hann hevði tilhald ta náttina í flokkinum.

22 Og hann reis upp ta náttina, og tók konur sínar tvær, og sínar tvær tænastukvinnur, og sínar ellivu synir, og fór yvirum vaðið Jăb´-bŏk.

23 Og hann tók tey, og sendi tey yvirum vaðið; og sendi yvirum tað hann hevði.

24 ¶ Og Jákob varð eftir einsamallur; og tað bardist ein maður við hann inntil lýsnan dagsins.

25 Og tá ið hann sá, at hann hevði ikki yvirvág ímóti honum, nam hann við hansara mjadnarskál; og mjadnarskálin hjá Jákobi var úti úr liði, sum hann bardist við hann.

26 Og hann segði, Lat meg fara, tí at dagurin lýsnar. Og hann segði, Eg vil ikki lata teg fara, uttan tú vælsigni meg.

27 Og hann segði við hann, Hvat *er* navn títt? Og hann segði, Jákob.

28 Og hann segði, Títt navn skal ei meira verða kallað Jákob, men Ísrael: tí at sum ein prinsur hevurt tú mátt hjá Guði og hjá monnum, og hevurt havt yvirvág.

29 Og Jákob spurdi *hann,* og segði, Sig *mær,* eg biði teg, navn títt. Og hann segði, Hvørsvegna *er* tað, *at* tú spyrt eftir navni mínum? Og hann vælsignaði hann har.

30 Og Jákob kallaði navnið á plássinum Pĕn´-ĭ-ĕl: tí at eg havi sæð Guð andlit til andlits, og lív mítt er varðveitt.

31 Og sum hann fór yvirum Pĕn-ū´-ĕl, reis sólin uppá hann, og hann haltaði uppiá síni mjødn.

32 Tí eta Ísraels børn ikki *av* sinuni sum gav seg, sum *er* uppiá mjadnarskálini, at hesum degi: av tí at hann nam við mjadnarskálina hjá Jákobi í sinuni sum gav seg.

KAPITUL 33

OG Jákob lyfti upp eygum sínum, og hugdi, og sí, Esav kom, og við honum fýra hundrað menn. Og hann deildi børnini at Leuh, og at Racheli, og at tænastumoyggjunum tveim.

2 Og hann setti tænastumoyggjarnar og teirra børn fremst, og Leuh og hennara børn aftanfyri, og Rachel og Jóseph aftast.

3 Og hann fór yvir undan teimum, og boygdi seg til jarðarinnar sjey ferðir, inntil hann kom nær til bróður síns.

4 Og Esav rann at møta honum, og umfevndi hann, og fell á háls hansara, og kysti hann: og teir grótu.

5 Og hann lyfti upp eygum sínum, og sá kvinnurnar og børnini; og segði, Hvørji *eru* hasi við tær? Og hann segði, Tey børnini, sum Guð hevur náðisamligani givið tænara tínum.

6 Tá komu tænastumoyggjarnar nær, tær og børn teirra, og tey boygdu seg.

7 Og Leah eisini við børnum sínum kom nær, og boygdu seg: og síðani kom Jóseph nær og Rachel, og tey boygdu seg.

8 Og hann segði, Hvat *meinart* tú við øllum hesum flokkinum, sum eg møtti? Og hann segði, *Hesi eru fyri* at finna náði í eygsjón harra míns.

9 Og Esav segði, Eg havi nóg mikið, bróðir mín; hav tað, tú hevurt, at tær sjálvum.

10 Og Jákob segði, Nei, eg biði teg, um nú eg havi funnið náði í eygsjón tíni, tá tak við gávu míni av míni hond: tí at tessvegna havi eg sæð andlit títt, sum um eg hevði sæð andlit Guðs, og tú vart nøgdur við meg.

11 Tak, eg biði teg, mína signing sum er borin til tín; av tí at Guð hevur náðisamligani farið við mær, og av tí at eg havi nóg mikið. Og hann noyddi hann, og hann tók *tað*.

12 Og hann segði, Latum okkum taka ferð okkara, og latum okkum fara, og eg vil fara undan tær.

13 Og hann segði við hann, Mín harri veit, at børnini *eru* viðkvom, og smáfæafylgini og stórfæafylgini við ungum *eru* hjá mær: og um menn skuldu overvað tey ēin dag, vil allur flokkurin doyggja.

14 Lat harra mín, eg biði teg, fara yvir undan tænara sínum: og eg vil leiða áfram eymligani, samsvarandi sum fenaðurin, sum gongur undan mær og børnini, veri før fyri at halda út, inntil eg komi at harra mínum at Sē′-īr.

15 Og Esav segði, Lat meg nú eftirlata hjá tær *summi* av fólkunum sum *eru* við mær. Og hann segði, Hvat tørvar tað? lat meg finna náði í eygsjón harra míns.

16 ¶ So Esav vendi aftur tann dagin á leið síni at Sē′-īr.

17 Og Jákob ferðaðist til Sŭc′-cōth, og bygdi sær eitt hús, og gjørdi búðir til fenað sín: tí verður navnið á plássinum kallað Sŭc′-cōth.

18 ¶ Og Jákob kom til Sjá′-lēm, ein stað av Sjē′-chĕm, sum *er* í landi Cānaans, tá ið hann kom frá Pá′-dăn-ár′-ăm; og sló upp tjald sítt frammanfyri staðin.

19 Og hann keypti eitt stykki av einum akri, har hann hevði breitt tjald sítt, av hond Há′-mŏr-s barna, faðir Sjē′-chĕm-s, fyri hundrað stykkir av peningi.

20 Og hann reisti har eitt altar, og kallaði tað Ĕl-ĕl′-ō-hê-Īs′-rā-ĕl.

KAPITUL 34

OG Dinah, dóttir Leuh, sum hon føddi Jákobi, fór út at síggja døtur landsins.

2 Og tá ið Sjē′-chĕm, sonur

Há´-mör-s Hivita, prins landsins, sá hana, tók hann hana, og lá við henni, og dálkaði hana.

3 Og sál hansara krøktist at Dinuh, dóttur Jákobs, og hann elskaði gentuna, og talaði blíðligani við gentuna.

4 Og Sjē´-chĕm talaði við faðir sín Há´-mör, sigandi, Fá mær hesa gentu til konu.

5 Og Jákob hoyrdi, at hann hevði dálkað Dinuh, dóttur sína: nú, synir hansara vóru við fenaðinum hjá honum á akrinum: og Jákob helt friði sínum, inntil teir vóru komnir.

6 ¶ Og Há´-mör, faðir Sjē´-chĕm-s, fór út til Jákobs at samtala við hann.

7 Og synirnir hjá Jákobi komu uttan av akrinum tá ið teir hoyrdu *tað:* og menninir vórðu harmir, og teir vórðu sera vreiðir, av tí at hann hevði virkað dárskap í Ísrael, í at liggja við dóttur Jákobs; hvør lutur átti ikki at verðið gjørdur.

8 Og Há´-mör samtalaði við teir, sigandi, Sál sonar míns, Sjē´-chĕm-s, leingist eftir dóttur tykkara: eg biði tykkum geva hana honum til konu.

9 Og gerið tit giftamál við okkum, *og* gevið tykkara døtur at okkum, og takið okkara døtur at tykkum.

10 Og tit skulu búgva hjá okkum: og landið skal vera frammi fyri tykkum; búgvið og handlið tit í tí, og fáið tykkum ognir harí.

11 Og Sjē´-chĕm segði við faðir hennara og við brøður hennara, Latið meg finna náði í eygum tykkara; og tað, *sum* tit skulu siga við meg, vil eg geva.

12 Biðjið meg um barasta so mikið brúðarfylgi og gávu, og eg vil geva samsvarandi sum tit skulu siga við meg: men gevið mær gentuna til konu.

13 Og synirnir hjá Jákobi svaraðu Sjē´-chĕm-i og Há´-mör-i, faðir hansara, svikaligani, og søgdu, av tí at hann hevði dálkað Dinuh, systur teirra:

14 Og teir søgdu við teir, Vit kunnu ikki gera hetta ting, at geva okkara systur til ēin sum er óumskorin; tí at tað *hevði verið* okkum skemd:

15 Men í hesum vilja vit samtykkja tykkum: Um tit vilji verða sum vit *veri,* at hvør kallkyns av tykkum verði umskorin;

16 Tá vilja vit geva okkara døtur at tykkum, og vit vilja taka tykkara døtur til okkara, og vit vilja dvøljast hjá tykkum, og vit vilja gerast ēitt fólk.

17 Men um tit vilji ikki lýða á okkum, at verða umskornir; tá vilja vit taka okkara dóttur, og vit vilja vera farnir.

18 Og teirra orð hóvaðu Há´-mör-i, og Sjē´-chĕm-i, syni Há´-mör-s.

19 Og tann ungi maðurin drálaði ikki at gera hetta, av tí at hann hevði fragd í dóttur Jákobs: og hann *var* meiri heiðursamur enn alt hús faðirs síns.

20 ¶ Og Há´-mör og Sjē´-chĕm, sonur hansara, komu at portrinum av staði sínum, og samtalaðu við menninar av staði sínum, sigandi,

21 Hesir menn *eru* friðsamir hjá okkum; latið teir tessvegna búgva í landinum, og handla í tí; tí at landið, sí, *tað er* stórt nokk til teirra; latum okkum taka teirra døtur til okkara sum konur, og latum okkum geva teimum okkara døtur.

22 Einans herí vilja menninir samtykkja okkum fyri at búgva hjá okkum, til at vera ēitt fólk, um hvør kallkyns okkara millum verði umskorin, eins og teir *eru* umskornir.

23 *Skal* ikki teirra fenaður og teirra *fíggjar*ogn og hvørt djór hjá teimum *verða* okkara? einans

latum okkum samtykkja teimum, og teir vilja búgva hjá okkum.

24 Og innat Há´-mŏr-i og Sjē´-chĕm-i, syni hansara, góvu gætur allir sum fóru út úr portrinum av staði hansara; og hvør kallkyns varð umskorin, allir sum fóru út úr portrinum av staði hansara.

25 ¶ Og tað bar á í tí triðja deginum, tá ið teir vóru sárir, at tveir av sonum Jákobs, Símeon og Levī, brøður Dinuh, tóku hvør maður sítt svørð, og komu uppá staðin djarvligani, og vógu allar hannarnar.

26 Og teir vógu Há´-mŏr og Sjē´-chĕm, son hansara, við svørðseggini, og tóku Dinuh út úr húsi Sjē´-chĕm-s, og fóru út.

27 Synirnir hjá Jákobi komu uppá hinar vignu, og rændu staðin, av tí at teir høvdu dálkað systur teirra.

28 Teir tóku teirra seyðir, og teirra oksar, og asnar, og tað sum *var* í staðinum, og tað sum *var* á akrinum,

29 Og alt teirra ríkidømi, og øll hini smáu teirra, og teirra konur tóku teir *til* fanga, og rændu enntá alt sum *var* í húsinum.

30 Og Jákob segði til Símeons og Levīs, Tit hava órógvað meg, til at fáa meg at stinka millum íbúgva landsins, millum Cānaanitanna og Pê-rīz-zīt´-anna: og eg, *verandi* fámentur, skulu teir savna seg saman ímóti mær, og bana mær; og eg skal verða oyddur, eg og mítt hús.

31 Og teir søgdu, Skuldi hann fara við systur okkara sum við eini skøkju?

KAPITUL 35

OG Guð segði við Jákob, Reis *teg,* far niðan til Beth-el, og búgv har: og ger har eitt altar at Guði, sum birtist tær, tá ið tú flýddirt frá andliti Esavs, bróðurs tíns.

2 Tá segði Jákob við húshald sítt, og til alra sum við honum *vóru,* Koyrið burt hinar fremmandu gudar, sum *eru* tykkara millum, og verið reinir, og skiftið klæðir tykkara:

3 Og latum okkum reisast, og fara niðan til Beth-el; og eg vil gera har eitt altar at Guði, sum svaraði mær á degi neyðarstands míns, og var við mær á veginum sum eg fór.

4 Og teir góvu at Jákobi allar hinar fremmandu gudar sum *vóru* í teirra hond, og *allar sínar* oyrnaringar sum *vóru* í teirra oyrum; og Jákob fjaldi teir undir eikini sum *var* við Sjē´-chĕm.

5 Og teir ferðaðust: og Guðs ræðsla var uppiá staðunum sum *vóru* rundan um teir, og teir eltu ikki eftir sonum Jákobs.

6 ¶ So Jákob kom til Lûz, sum *er* í landi Cānaans, tað *er,* Beth-el, hann og øll fólkini sum *vóru* við honum.

7 Og hann bygdi har eitt altar, og kallaði staðið Ĕl-bĕth´-ĕl: av tí at har birtist Guð honum, tá ið hann flýddi frá andliti bróðurs síns.

8 Men Dē´-bôr-ăh, dadda Rebēkuh, doyði, og hon varð jarðað niðanfyri Beth-el undir eini eik: og navnið á henni varð kallað Ăl´-lŏn-bâ-chŭth.

9 ¶ Og Guð birtist at Jákobi aftur, tá ið hann kom út úr Pá´-dăn-ár´-ăm, og vælsignaði hann.

10 Og Guð segði við hann, Títt navn *er* Jákob: títt navn skal ei verða kallað meira Jákob, men Ísrael skal navn títt vera: og hann kallaði navn hansara Ísrael.

11 Og Guð segði við hann, Eg *eri* Guð Almáttugi: ver fruktagóður og margfaldast; ein tjóð og ein flokkur av tjóðum skulu verða úr tær, og kongar skulu koma út úr lendum tínum;

12 Og landið, sum eg gav Ábra-

hami og Ísaaki, til tín vil eg geva tað, og til sáð títt eftir teg vil eg geva landið.

13 Og Guð fór upp frá honum á staðnum har hann talaði við hann.

14 Og Jákob setti upp eina súlu á staðnum har hann talaði við hann, *enntá* eina súlu av steini: og hann helti eitt drykkoffur hará, og hann helti olju hará.

15 Og Jákob kallaði navnið á staðnum, har Guð talaði við hann, Beth-el.

16 ¶ Og teir ferðaðust frá Beth-el; og tað var bert ein stuttur vegur at koma til Ē′-phrăth: og Rachel hevði verkir, og hon hevði harða barnsótt.

17 Og tað bar á, tá ið hon var í harðari barnsótt, at nærkonan segði við hana, Óttast ikki; tú skalt eiga hendan sonin eisini.

18 Og tað bar á, sum hennara sál var í fráferð, (tí at hon doyði), at hon kallaði navn hansara Bĕn-ō′-nī: men faðir hansara kallaði hann Benjamin.

19 Og Rachel doyði, og varð jarðað á vegnum til Ē′-phrăth, sum *er* Beth-lehem.

20 Og Jákob setti eina súlu uppá grøv hennara: tað *er* súlan av grøv Rachelar at hesum degi.

21 ¶ Og Ísrael ferðaðist, og breiddi tjald sítt handan Ē′-dâr-s torn.

22 Og tað bar á, tá ið Ísrael dvaldist í tí landinum, at Reûben fór og lá hjá Bĭl′-hŭh, medkonu faðirs síns: og Ísrael hoyrdi *tað*. Nú, synirnir hjá Jákobi vóru tólv:

23 Synirnir hjá Leuh; Reûben, Jákobs fyrstiføddi, og Símeon, og Levī, og Judah, og Ĭs′-să-chăr, og Zē′-bŭ-lŏn:

24 Synirnir hjá Racheli; Józeph, og Benjamin:

25 Og synirnir hjá Bĭl′-hŭh, tænastumoy Rachelar; Dán, og Năph′-tâ-lī:

26 Og synirnir hjá Zilpuh, tænastumoy Leuh; Gád, og Ásjer: hesir *eru* synir Jákobs, sum vórðu føddir til hansara í Pá′-dăn-ár′-ăm.

27 ¶ Og Jákob kom at Ísaaki, faðir sínum, til Măm′-rê, til Ăr′-bŭh staðar, sum *er* Hē′-brŏn, har Ábraham og Ísaak*ur* útisótu.

28 Og dagarnir hjá Ísaaki vóru eitt hundrað og fýrsinstjúgu ár.

29 Og Ísaak*ur* gav upp andan, og doyði, og varð savnaður at fólki sínum, *verandi* gamalur og mettur av døgum: og hansara synir, Esav og Jákob, jarðaðu hann.

KAPITUL 36

NÚ, hetta *eru* ættirnar hjá Esavi, sum *er* Ē′-dóm.

2 Esav tók konur sínar av døtrum Cānaans; Ā′-dŭh, dóttur Ē′-lŏn-s Hittita; og Ă-hól-ĭ-bá′-mŭh, dóttur Á′-nâh, dóttur Zī′-bē-ŏn-s Hî-vĭt′-a;

3 Og Bá′-sjê-măth, dóttur Ísj′-mâ-ĕl-s, systur Nē-bā′-jŏth-s.

4 Og Ā′-dăh føddi til Esavs Ē′-lĭ-phăz; og Bá′-sjê-măth føddi Reû′-ĕl;

5 Og Ă-hól-ĭ-bá′-măh føddi Jē′-ŭsj, og Já′-ă-lăm, og Kōr′-ăh: hesir *eru* synir Esavs, sum vórðu føddir honum í landi Cānaans.

6 Og Esav tók konur sínar, og synir sínar, og døtur sínar, og allar persónar húss síns, og fenað sín, og øll djór síni, og alt sítt *figgjar*evni, sum hann hevði fingið í landi Cānaans; og fór inn í landið frá andliti bróðurs síns Jákobs.

7 Tí at ríkidømini hjá teimum vóru meiri enn at teir fingu búð saman; og landið, í hvørjum teir vóru fremmandir, kundi ikki bera teir, uppá grund av teirra fenaði.

8 Soleiðis dvaldist Esav á Sē′-ír fjalli: Esav *er* Ē′-dóm.

9 ¶ Og hetta *eru* ættirnar hjá Esavi, faðir Ê-dóm-ĭt´-anna, á Sē´-īr fjalli:
10 Hesi *eru* nøvnini hjá sonum Esavs; Ē´-lī-p̲hăz, sonur Ā´-dŭh, konu Esavs; Rĕū´-ĕl, sonur Bá´-sjê-măth-ar, konu Esavs.
11 Og synirnir hjá Ē´-lī-p̲hăz-i vóru Tē´-măn, Ómar, Zē´-p̲hō, og Gá´-tăm, og Kē´-năz.
12 Og Tím´-ná var medkona hjá Ē´-lī-p̲hăz-i, syni Esavs; og hon føddi til Ē´-lī-p̲hăz-ar Ā´-mâ-lēk: hesir *vóru* synirnir hjá Ā´-dŭh, konu Esavs.
13 Og hesir *eru* synir Rĕū´-ĕl-s; Náhath, og Zē´-râh, Sjăm´-măh, og Mīz´-zâh: hesir vóru synirnir hjá Bá´-sjê-măth-i, konu Esavs.
14 ¶ Og hesir vóru synirnir hjá Ă-hól-ī-bá´-mŭh, dóttur Á´-nâh, dóttur Zī´-bē-ŏn-s, konu Esavs: og hon føddi til Esavs Jē´-ŭsj, og Já´-ă-lăm, og Kōr´-ăh.
15 ¶ Hesir *vóru* hertogar av sonum Esavs: synirnir hjá Ē´-lī-p̲hăz-i, frumborna *syni* Esavs; Tē´-măn hertogi, Ómar hertogi, Zē´-p̲hō hertogi, Kē´-năz hertogi,
16 Kōr´-ăh hertogi, Gá´-tăm hertogi, *og* Ā´-mâ-lēk hertogi: hesir *eru* hertogarnir, *sum komu* av Ē´-lī-p̲hăz-i í landi Ē´-dóm-s; hesir *vóru* synir Ā´-dŭh.
17 ¶ Og hesir *eru* synir Rĕū´-ĕl-s Esavs sonar; Náhath hertogi, Zē´-râh hertogi, Sjăm´-măh hertogi, Mīz´-zâh hertogi: hesir *eru* hertogarnir, *sum komu* av Rĕū´-ĕl-i í landi Ē´-dóm-s; hesir *eru* synirnir hjá Bá´-sjê-măth-i, konu Esavs.
18 ¶ Og hesir *eru* synirnir hjá Ă-hól-ī-bá´-mŭh, konu Esavs; Jē´-ŭsj hertogi, Já´-ă-lăm hertogi, Kōr´-ăh hertogi: hesir *vóru* hertogarnir, *sum komu* av Ă-hól-ī-bá´-mŭh, dóttur Á´-nâh, konu Esavs.
19 Hesir *eru* synir Esavs, sum *er* Ē´-dóm, og hesir *eru* hertogar teirra.
20 ¶ Hesir *eru* synirnir hjá Sē´-īr-i Hōr-īt´-a, sum íbúðu landið; Lō´-ţăn, og Sjō´-băl, og Zī´-bē-ŏn, og Á´-nâh,
21 Og Dī´-sjŏn, og Ē´-zĕr, og Dī´-sjăn: hesir *eru* hertogarnir hjá Hōr-īt´-unum, Sē´-īr-s børn í landi Ē´-dóm-s.
22 Og børnini hjá Lō´-ţăn-i vóru Hó´-rī og Hē´-măm; og systir Lō´-ţăn-s *var* Tím´-ná.
23 Og børnini hjá Sjō´-băl-i *vóru* hesir; Ál´-văn, og Măn´-ă-hăth, og Ē´-băl, Sjē´-p̲hō, og Ō´-năm.
24 Og hesir *eru* børn Zī´-bē-ŏn-s; bæði Á´-jâh, og Á´-nâh: hetta *var tann* Á´-nâh sum fann múldjórini í oyðuni, sum hann gav asnum Zī´-bē-ŏn-s, faðirs síns.
25 Og børnini hjá Á´-nâh *vóru* hesi; Dī´-sjŏn; og Ă-hól-ī-bá´-măh, dóttir Á´-nâh.
26 Og hesir *eru* børn Dī´-sjŏn-s; Hĕm´-dăn, og Ēsj´-băn, og Ĭth´-răn, og Chē´-răn.
27 Børn Ē´-zĕr-s *eru* hesir; Bilhan, og Zā´-ă-văn, og Ákan.
28 Børn Dī´-sjăn-s *eru* hesir; Úz, og Ár´-ăn.
29 Hesir *eru* hertogarnir, *sum komu* av Hōr-īt´-unum; Lō´-ţăn hertogi, Sjō´-băl hertogi, Zī´-bē-ŏn hertogi, Á´-nâh hertogi,
30 Dī´-sjŏn hertogi, Ē´-zĕr hertogi, Dī´-sjăn hertogi: hesir *eru* hertogarnir, *sum komu* av Hó´-rī; millum hertoga teirra í Sē´-īr-s landi.
31 ¶ Og hesir *eru* kongarnir, sum ríktu í landi Ē´-dóm-s, áðrenn tað ríkti nakar kongur yvir børnum Ísraels.
32 Og Bē´-lă Bē´-ōr-s sonur ríkti í Ē´-dóm: og navnið á staði hansara *var* Dĭn´-hă-bâh.
33 Og Bē´-lă doyði, og Jó´-băb Zē´-râh sonur úr Bŏz´-răh ríkti í hansara stað.
34 Og Jó´-băb doyði, og Hū´-sjăm úr Tē-măn´-ī-s landi ríkti í hansara stað.
35 Og Hū´-sjăm doyði, og Há´-dăd Bē´-dăd-s sonur, sum sló

Mĭ′-dĭ-ăn á vølli Móabs, ríkti í hansara stað: og navnið á hansara staði *var* Á′-vĭth.

36 Og Há′-dăd doyði, og Săm′-lăh úr Măs-rē′-kăh ríkti í hansara stað.

37 Og Săm′-lăh doyði, og Saul úr Rē′-hŏ-bōth *við* ánna ríkti í hansara stað.

38 Og Saul doyði, og Bā′-ăl-há′-năn Ăch′-bōr-s sonur ríkti í hansara stað.

39 Og Bā′-ăl-há′-năn Ăch′-bōr-s sonur doyði, og Há′-dâr ríkti í hansara stað: og navnið á hansara staði *var* Pā′-ū; og navn konu hansara *var* Mĕ-hĕt′-ă-bĕl, Má′-trĕd-s dóttir, Mē′-zā-hăb-s dóttir.

40 Og hesi *eru* nøvnini hjá hertogunum *sum komu* av Esavi, samsvarandi við teirra familjur, eftir teirra plássum, eftir teirra nøvnum; Tĭm′-năh hertogi, Ăl′-văh hertogi, Jē′-thĕth hertogi,

41 Ă-hól-ĭ-bá′-măh hertogi, Ē′-lăh hertogi, Pĭ′-nōn hertogi,

42 Kē′-năz hertogi, Tē′-măn hertogi, Mĭb′-zâr hertogi,

43 Măg′-dĭ-ĕl hertogi, Ĭ′-răm hertogi: hesir *veri* hertogar Ē′-dóm-s, samsvarandi við teirra bústaðir í landi ognar teirra: hann *er* Esav, faðir Ê-dóm-ĭt′-anna.

KAPITUL 37

OG Jákob dvaldist í landinum, í hvørjum faðir hansara var ein fremmandur, í landi Cānaans.

2 Hetta *eru* ættirnar hjá Jákobi. Jóseph, *verandi* seytjan ára gamalur, gav fylginum við brøðrum sínum; og pilturin *var* við sonum Bĭl′-hŭh, og við sonum Zilpuh, konum faðirs síns: og Jóseph bar faðir sínum teirra illa ummæli.

3 Nú, Ísrael elskaði Jóseph meira enn øll síni børn, av tí at hann *var* sonur ellis hansara: og hann gjørdi honum ein *fjøl*-lita kyrtil.

4 Og tá ið brøður hansara sóu, at faðir teirra elskaði hann meira enn allar brøður hansara, hataðu teir hann, og kundu ikki tala friðsamliga við hann.

5 ¶ Og Jóseph droymdi dreym, og hann taldi *hann* brøðrum sínum: og teir hataðu hann uppaftur meira.

6 Og hann segði við teir, Hoyrið, eg biði tykkum, henda dreym sum meg hevur droymt:

7 Tí at sí, vit bundu bundir á akrinum, og sí, mítt bundi reistist, og eisini stóð upprætt; og sí, tykkara bundir stóðu rundan um, og intu heiðurslútan fyri bundi mínum.

8 Og brøður hansara søgdu við hann, Skalt tú veruliga ríkja yvir okkum? ella skalt tú veruliga hava harradømi yvir okkum? Og teir hataðu hann uppaftur meira fyri dreymar hansara, og fyri orðini hjá honum.

9 ¶ Og hann droymdi uppaftur ein annan dreym, og taldi hann brøðrum sínum, og segði, Sí, meg hevur droymt ein dreym afturat; og sí, sólin og mánin og hinar ellivu stjørnurnar intu heiðurslútan fyri mær.

10 Og hann taldi *hann* fyri faðir sínum, og fyri brøðrum sínum: og faðir hansara hartaði hann, og segði við hann, Hvat *er* hesin dreymurin sum teg hevur droymt? Skulu eg og móðir tín og brøður tínir veruliga koma at boyggja niður okkum sjálv fyri tær til jarðarinnar?

11 Og hansara brøður øvundaðu hann; men faðir hansara gav far eftir framsøgnini.

12 ¶ Og hansara brøður fóru at geva smáfæafylgi faðirs síns í Sjĕ′-chĕm.

13 Og Ísrael segði við Jóseph, Geva ikki brøður tínir *fylginum* í Sjĕ′-chĕm? kom, og eg vil senda teg til teirra. Og hann segði við hann, Her *eri eg*.

14 Og hann segði við hann, Far, eg biði teg, vita hvørt tað viti væl *við* hjá brøðrum tínum, og væl *við* hjá fylgjunum; og ber mær orð aftur. So hann sendi hann út úr dali Hē´-brŏn-s, og hann kom til Sjē´-chĕm.

15 ¶ Og ein ávísur maður fann hann, og sí, *hann* reikaði um í akrinum: og maðurin spurdi hann, sigandi, Hvat søkirt tú?

16 Og hann segði, Eg søki brøður mínar: sigið mær, eg biði tygum, hvar teir geva *fylgjum sínum*.

17 Og maðurin segði, Teir eru farnir avstað hiðani; tí at eg hoyrdi teir siga, Latum okkum fara til Dō´-thăn. Og Jóseph fór eftir brøðrum sínum, og fann teir í Dō´-thăn.

18 Og tá ið teir sóu hann langt burturifrá, enntá áðrenn hann kom nær at teimum, samansvóru teir ímóti honum at bana honum.

19 Og teir søgdu hvør við annan, Sí, hesin droymarin kemur.

20 Komið nú tessvegna, og latum okkum bana honum, og kasta hann inn í onkra holu, og vit vilja siga, Okkurt ónt villdjór hevur slúkað hann: og vit skulu síggja hvat vil verða úr dreymum hansara.

21 Og Reûben hoyrdi *tað,* og hann bjargaði honum út úr hondum teirra; og segði, Latum okkum ikki drepa hann.

22 Og Reûben segði við teir, Úthellið einkið blóð, *men* kastið hann inn í hesa holuna sum *er* í oyðuni, og leggið onga hond uppá hann; at hann mátti bjargað honum út úr hondum teirra, til *tess* at bjarga honum til faðirs hansara aftur.

23 ¶ Og tað bar á, tá ið Jóseph var komin at brøðrum sínum, at teir berkaðu Jóseph úr hansara kyrtli, *hansara fjøl*-lita kyrtli sum *var* á honum;

24 Og teir tóku hann, og kastaðu hann inn í eina holu: og holan *var* tóm, *tað var* einkið vatn í henni.

25 Og teir settust niður at eta breyð: og teir lyftu upp eygum sínum, og sí, ein flokkur av Ísj-mē´el-īt´-um kom frá Gilead við kamelum sínum, berandi kryddaríir og balsam og myrrhu, farandi at bera *tað* niður til Egyptalands.

26 Og Judah segði við brøður sínar, Hvat gagn *er tað,* um vit bana bróður okkara, og loyna blóð hansara?

27 Komið, og latum okkum selja hann til Ísj-mē´el-īt´-anna, og lat ikki hond okkara vera uppiá honum; tí at hann *er* bróðir okkara *og* kjøt okkara. Og hansara brøður lótu sær lynda.

28 Tá fóru tað framvið Mī-dī-ă-nīt´-a keypmenn; og teir drógu og lyftu upp Jóseph út úr holuni, og seldu Jóseph til Ísj-mē´el-īt´-anna fyri tjúgu *stykkir* av silvuri: og teir førdu Jóseph inn í Egyptaland.

29 ¶ Og Reûben vendi aftur at holuni; og sí, Jóseph *var* ikki í holuni; og hann skræddi klæðir síni.

30 Og hann vendi aftur at brøðrum sínum, og segði, Barnið *er* ikki; og eg, hvagar skal eg fara?

31 Og teir tóku kyrtilin hjá Jósephi, og drópu eitt lamb hjá geitunum, og dyppaðu kyrtilin í blóðið;

32 Og teir sendu *fjøl*-lita kyrtilin, og teir bóru *hann* til faðirs síns; og søgdu, Henda hava vit funnið: vita nú, hvørt hann *veri* kyrtilin hjá syni tínum, ella ikki.

33 Og hann kendi hann, og segði, *Tað er* kyrtilin hjá syni mínum; eitt ónt villdjór hevur slúkað hann; Jóseph er óivað skræddur í stykkir.

34 Og Jákob skræddi klæðir síni, og koyrdi sekkjaklæði uppá lendar sínar, og harmaði yvir son sín mangar dagar.

35 Og allir synir hansara og all-

ar dǿtur hansara risu upp at ugga hann; men hann sýtti at verða uggaður; og hann segði, Tí at eg vil fara niður í grøvina til sonar míns harmandi. Soleiðis græt faðir hansara um hann.

36 Og Mī-dī-ă-nīt´-arnir seldu hann inn í Egyptaland til Pō´-tī-phâr-s, ein embætismann hjá Pharaoh, *og* høvuðsmaður av lívverjuni.

KAPITUL 38

OG tað bar á um ta tíðina, at Judah fór oman frá brøðrum sínum, og vendi inn til ein ávísan Adullamita, hvørs navn *var* Hī´-răh.

2 Og Judah sá har eina dóttur hjá einum ávísum Cānaanita, hvørs navn *var* Sjū´-âh; og hann tók hana, og fór inn at henni.

3 Og hon ól fram, og føddi ein son; og hann kallaði navn hansara Êr.

4 Og hon ól fram aftur, og føddi ein son; og hon kallaði navn hansara Ó´-năn.

5 Og uppaftur ól hon fram, og føddi ein son; og kallaði navn hansara Sjē´-lâh: og hann var í Chē´-zīb, tá ið hon føddi hann.

6 Og Judah tók eina konu til Êrs, sín frumborna, hvørs navn *var* Tá´-mâr.

7 Og Êr, frumborni Judah, var vondur í eygsjón HARRANS; og HARRIN vó hann.

8 Og Judah segði við Ó´-năn, Far inn at konu bróðurs tíns, og gift *teg við* henni, og reis upp sáð til bróðurs tíns.

9 Og Ó´-năn vitsti, at sáðið skuldi ikki verða hansara; og tað bar á, tá ið hann fór inn at konu bróðurs síns, at hann stoytti *tað* á jørðina, bara ikki at hann skuldi givið sáð til bróðurs síns.

10 Og tað tingið, sum hann gjørdi, mistoknaði HARRANUM: hvørsvegna hann vó hann eisini.

11 Tá segði Judah til Tá´-mâr-ar, verdóttur sínar, Verð verandi einkja í húsi faðirs tíns, til Sjē´-lâh, sonur mín, verði vaksin: tí hann segði, at ikki møguligvís hann doyggi eisini, eins og brøður hansara *gjørdu*. Og Tá´-mâr fór og búði í húsi faðirs síns.

12 ¶ Og í framlíðing tíðarinnar doyði dóttir Sjū´-âh, kona Judah; og Judah varð uggaður, og fór niðan til seyðaklippararnar til Tĭm´-năth, hann og vinur hansara Hī´-răh, Adullamitin.

13 Og tað varð sagt Tá´-mâr-i, sigandi, Sí, verfaðir tín fer niðan til Tĭm´-năth at klippa seyði sínum.

14 Og hon fór úr sínum einkjuklæðum av sær, og dekkaði seg við einum sløri, og ballaði seg, og sat í einum opnum plássi, sum *er* við vegin til Tĭm´-năth; tí hon sá, at Sjē´-lâh var vaksin, og hon var ikki givin honum til konu.

15 Tá ið Judah sá hana, helt hann hana *vera* eina skøkju; av tí at hon hevði dekkað andlit sítt.

16 Og hann vendi inn at henni við vegin, og segði, Kom nú, eg biði teg, lat meg koma inn at tær; (tí at hann vitsti ikki, at hon *var* verdóttir hansara.) Og hon segði, Hvat vilt tú geva mær, at tú mást koma inn at mær?

17 Og hann segði, Eg vil senda *tær* eitt geitarlamb frá fylginum. Og hon segði, Vilt tú geva *mær* eitt pant, til tú sendi *tað?*

18 Og hann segði, Hvat pant skal eg geva tær? Og hon segði, Tín innsiglisring, og tíni armbond, og tín stav, sum *er* í hond tíni. Og hann gav *tað* henni, og kom inn at henni, og hon ól fram av honum.

19 Og hon reistist, og fór avstað, og legði niðurfyri slør sítt frá sær, og fór í klæðir einkjudóms síns.

20 Og Judah sendi geitarlambið

viðˆ hendi vinar síns, Adullamitans, *fyri* at fáa *sítt* pant av kvinnunnar hond: men hann fann hana ikki.

21 Tá spurdi hann menninar av tí plássinum, sigandi, Hvar *er* skøkjan, sum *var* opinlýsliga við vegkantin? Og teir søgdu, Tað var eingin skøkja á hesum *staði.*

22 Og hann vendi aftur til Judah, og segði, Eg dugi ikki *at* finna hana; og eisini menninir av tí staðnum søgdu, *at* tað var eingin skøkja á hesum *staði.*

23 Og Judah segði, Lat hana taka *tað* til sín, at ikki vit verði til skammar: sí, eg sendi hetta geitarlambið, og tú hevurt ikki funnið hana.

24 ¶ Og tað bar á umleið tríggjar mánaðir eftir, at tað varð sagt Judah, sigandi, Tá´-mâr, verdóttir tín, hevur spælt skøkjan; og eisini, sí, hon *er* við barn við hordómi. Og Judah segði, Førið hana fram, og latið hana verða brenda.

25 Tá ið hon *varð* førd fram, sendi hon til verfaðirs síns, sigandi, Viðˆ tí manni, hvørs hesi *eru, eri* eg við barn: og hon segði, Greina, eg biði teg, hvørs hesi *eru,* innsiglisringurin, og armbond, og stavur.

26 Og Judah viðurkendi *tey,* og segði, Hon hevur verið meiri rættvís enn eg; vegna tess at eg gav hana ikki til Sjē´-lâh, sonar míns. Og hann kendi hana ei meira aftur.

27 ¶ Og tað bar á í tíðini av verkjum hennara, at sí, tvíburðir *vóru* í móðurlívi hennara.

28 Og tað bar á, tá ið hon hevði verkir, at *tann ēini* stakk út hond *sína:* og nærkonan tók og bant uppá hond hansara ein skarlaks tráð, sigandi, Hesin kom út fyrst.

29 Og tað bar á, sum hann dró tilbakar hond sína, at sí, bróðir hansara kom út: og hon segði, Hvussu hevurt tú brotist fram? *Hetta* skarð *veri* uppiá tær: tí varð navn hansara kallað Phâr´-ĕz.

30 Og síðani kom út bróðir hansara, sum hevði skarlaks tráðin uppiá síni hond: og navn hansara varð kallað Zār´-ăh.

KAPITUL 39

OG Jóseph varð førdur niður til Egyptalands; og Pō´-tĭphâr, ein yvirmaður hjá Pharaoh, høvuðsmaður av lívverjuni, ein Egypti, keypti hann av hondum Ísj-mē´ĕl-ĭt´-anna, sum høvdu ført hann niður hagar.

2 Og HARRIN var við Jósephi, og hann var ein framgangsríkur maður; og hann var í húsi meistara síns, Egyptans.

3 Og meistari hansara sá, at HARRIN *var* við honum, og at HARRIN elvdi øllum, sum hann gjørdi, at framganga í hond hansara.

4 Og Jóseph fann náði í eygsjón hansara, og hann tænti honum: og hann gjørdi hann *til* umsjónarmann yvir húsi sínum, og alt, *sum* hann hevði, legði hann í hond hansara.

5 Og tað bar á frá tí tíðini *sum* hann hevði gjørt hann *til* umsjónarmann í húsi sínum, og yvir øllum sum hann hevði, at HARRIN vælsignaði hús Egyptans fyri Jósephs skuld; og HARRANS signing var uppiá øllum sum hann hevði í húsinum, og í akrinum.

6 Og hann eftirlæt alt, sum hann hevði, í hond Jósephs; og hann vitaði ikki *um* nakað *sum* hann hevði, uttan breyðið sum hann át. Og Jóseph var *ein* frálíkur *persónur,* og sá gott út.

7 ¶ Og tað bar á eftir hesi tingini, at kona meistara hansara kastaði síni eygu uppá Jóseph; og hon segði, Ligg við mær.

8 Men hann sýtti, og segði við konu meistara síns, Sí, meistari mín vitar ikki hvat *er* hjá mær í húsinum, og hann hevur litið upp alt, sum hann hevur, til handar mínar;
9 *Tað er* eingin størri í hesum húsinum enn eg; eiheldur hevur hann hildið aftur nakað frá mær, uttan teg, av tí at tú *ert* kona hansara: hvussu kann eg tá gera hesa miklu vondsku, og synda ímóti Guði?
10 Og tað bar á, sum hon talaði til Jósephs dag um dag, at hann gav ikki gætur at henni, at liggja hjá henni, *ella* at vera við henni.
11 Og tað bar á um hesa tíð, at *Jóseph* fór inn í húsið at gera gerning sín; og *tað var* eingin av monnunum av húsinum har fyri innan.
12 Og hon fangaði hann eftir klæði hansara, sigandi, Ligg við mær: og hann eftirlæt klæði sítt í hond hennara, og flýddi, og slapp sær út.
13 Og tað bar á, tá ið hon sá, at hann hevði eftirlætið klæði sítt í hond hennara, og var flýddur fram,
14 At hon kallaði á menninar av húsi sínum, og talaði við teir, sigandi, Sí, hann hevur ført inn ein Hebrēara til okkara at háða okkum; hann kom inn til mín at liggja við mær, og eg rópti við harðari rødd:
15 Og tað bar á, tá ið hann hoyrdi at eg lyfti upp mína rødd og rópti, at hann eftirlæt klæði sítt hjá mær, og flýddi, og slapp sær út.
16 Og hon legði niðurfyri hansara klæði hjá sær, inntil harri hansara kom heim.
17 Og hon talaði við hann samsvarandi við hesi orðini, sigandi, Tann Hebrāiski tænarin, sum tú hevurt ført til okkara, kom inn til mín at háða meg:
18 Og tað bar á, sum eg lyfti upp mína rødd og rópti, at hann eftirlæt klæði sítt hjá mær, og flýddi út.
19 Og tað bar á, tá ið hansara meistari hoyrdi orðini hjá konu síni, sum hon talaði við hann, sigandi, eftir hesum háttarlagi gjørdi tænari tín við meg; at hansara vreiði varð kynd.
20 Og meistari Jósephs tók hann, og koyrdi hann í fongslið, eitt stað har fangarnir hjá kongi *vóru* bundnir: og hann var har í fongslinum.
21 ¶ Men HARRIN var við Jóseph, og sýndi honum miskunn, og gav honum tokka í eygsjónini á fongsulsvørðinum.
22 Og fongsulsvørðurin leit upp til handar Jósephs allar fangarnar sum *vóru* í fongslinum; og hvatsumhelst teir gjørdu har, hann var gerarin *av tí*.
23 Fongsulsvørðurin hugdi ikki eftir nøkrum *sum var* undir hond hansara; av tí at HARRIN var við honum, og *tað*, sum hann gjørdi, HARRIN fekk *tað* at framganga.

KAPITUL 40

OG tað bar á eftir hesi tingini, *at* skeinkjarin hjá kongi Egyptalands og *hansara* bakari høvdu meinbogað harra sín, kong Egyptalands.
2 Og Pharaoh var vreiður inná tveir *av* yvirmonnum sínum, inná hin ovasta av skeinkjarunum, og inná hin ovasta av bakarunum.
3 Og hann setti teir í varðhald í húsinum hjá høvuðsmanni lívverjunnar, inn í fongslið, staðið har Jóseph *var* bundin.
4 Og høvuðsmaðurin av lívverjuni álegði Jóseph við teimum, og hann tænti teimum: og teir hildu áfram eina tíð í varðhaldi.
5 ¶ Og teimum droymdi ein dreym, báðum teirra, hvør maður sín dreym í ēinari nátt, hvør

maður samsvarandi við týðingina
av sínum dreymi, skeinkjarin og
bakarin hjá kongi Egyptalands,
sum *vóru* bundnir í fongslinum.
6 Og Jóseph kom inn til teirra
um morgunin, og hugdi uppá teir,
og sí, teir *vóru* daprir.
7 Og hann spurdi yvirmenn-
inar hjá Pharaoh, sum *vóru* við
honum í varðhaldinum av húsi
harra síns, sigandi, Hví hyggja tit
so dapurligani í dag?
8 Og teir søgdu við hann, Okk-
um hevur droymt ein dreym, og
tað er eingin týðari av honum.
Og Jóseph segði við teir, *Hoyra*
ikki týðingar til Guðs? sigið mær
teir, eg biði tykkum.
9 Og høvuðsskeinkjarin segði
frá dreymi sínum fyri Jósephi, og
segði við hann, Í mínum dreymi,
sí, eitt víntræ *var* frammanfyri
mær;
10 Og í víntrænum *vóru* tríggjar
greinar: og tað *var* sum um tað
blómaði, *og* hennara blómingar
skutu út; og tess tyssir bóru fram
staðin vínber:
11 Og Pharaohs bikar *var* í
hond míni: og eg tók víndrúvur-
nar, og pressaði tær inn í Pha-
raohs bikar, og eg gav bikarið inn í
hond Pharaohs.
12 Og Jóseph segði við hann,
Hetta *er* týðingin av honum:
Tær tríggjar greinarnar *eru* tríggir
dagar:
13 Enn innan tríggjar dagar
skal Pharaoh lyfta upp høvur títt,
og endurbøta teg at plássi tínum:
og tú skalt flýggja Pharaohs bik-
ar inn í hond hansara, eftir hin-
um fyrra háttarlagi, tá ið tú vart
skeinkjari hansara.
14 Men tonk *upp*á meg, tá ið
tað skal vera væl *statt* við tær, og
sýn blídni, eg biði teg, innat mær,
og nevn meg yvirfyri Pharaoh, og
før meg út úr hesum húsinum:
15 Tí at veruliga varð eg stjolin
burtur út úr landi Hebrēaranna:
og her eisini havi eg einkið gjørt,
til at teir skuldu rindað meg inn
í fangatippið.
16 Tá ið høvuðsbakarin sá,
at týðingin var góð, segði hann
við Jóseph, Eg eisini *var* í dreymi
mínum, og sí, *eg hevði* tríggjar
hvítar tægur á høvdi mínum:
17 Og í tí ovastu tæguni *var*
av øllum slagi av bakstursmatum
til Pharaohs; og fuglarnir ótu teir
úr tæguni uppiá høvdi mínum.
18 Og Jóseph svaraði og
segði, Hetta *er* týðing hansara:
Tær tríggjar tægurnar *eru* tríggir
dagar:
19 Enn innan tríggjar dagar
skal Pharaoh lyfta upp høvur títt
oman av tær, og skal hanga teg á
eitt træ; og fuglarnir skulu eta
kjøt títt uttan av tær.
20 ¶ Og tað bar á hin triðja
dagin, *sum var* føðingardagur
Pharaohs, at hann gjørdi øllum
tænarum sínum eina veitslu: og
hann lyfti upp høvur høvuðs-
skeinkjarans og høvuðsbakarans,
millum tænara sína.
21 Og hann endurbøtti høvuðs-
skeinkjaran til hansara skeinkjara-
dømi aftur; og hann gav bikarið
inn í hond Pharaohs:
22 Men hann hongdi høvuðs-
bakaran: eins og Jóseph hevði
týtt fyri teimum.
23 Tó mintist høvuðsskeinkjar-
in ikki til Jósephs, men gloymdi
hann.

KAPITUL 41

OG tað bar á við endan á
tveimum samfullum árum,
at Pharaoh droymdi: og sí, hann
stóð við ánna.
2 Og sí, tað komu upp út úr
ánni sjey væl vaksnar kýr og feit-
kjøtaðar; og tær *gingu* á biti á eini
ong.
3 Og sí, sjey aðrar kýr komu
upp aftaná tær út úr ánni,
illa vaksnar og rak-kjøtaðar; og

stóðu hjá *hīnum* kúnum uppiá áarbakkanum.

4 Og tær illa vaksnu og rakkjøtaðu kýrnar ótu upp tær sjey væl vaksnu og feitu kýrnar. So vaknaði Pharaoh.

5 Og hann svav og droymdi aðru ferðina: og sí, sjey øks av korni komu upp uppiá ēinum strái, tjúkk og góð.

6 Og sí, sjey kløn øks og sviðin við eystanvindinum spruttu upp aftaná tey.

7 Og tey sjey kløntu øksini gloyptu tey sjey tjúkku og fullu øksini. Og Pharaoh vaknaði, og sí, *tað var* ein dreymur.

8 Og tað bar á um morgunin, at andi hansara var órógvaður; og hann sendi og kallaði eftir øllum gandakøllum Egyptalands, og øllum vísmonnum tess: og Pharaoh taldi teimum dreym sín; men *tað var* eingin sum kundi týða Pharaoh teir.

9 ¶ Tá mælti høvuðsskeinkjarin við Pharaoh, sigandi, Meg minnist feila mína henda dag:

10 Pharaoh var vreiður við tænarar sínar, og setti meg í varðhald í húsinum hjá høvuðsmanni lívverjunnar, *bæði* meg og høvuðsbakaran:

11 Og okkum droymdi ein dreym í ēinari nátt, meg og hann; okkum droymdi hvør maður samsvarandi við týðingina av dreymi sínum.

12 Og *tað var* har við okkum ein ungur maður, ein Hebrēari, tænari hjá høvuðsmanni lívverjunnar; og vit taldu honum, og hann týddi fyri okkum dreymar okkara; fyri hvørjum manni samsvarandi við hansara dreym týddi hann.

13 Og tað bar á, eins og hann týddi fyri okkum, soleiðis varð tað; meg endurbøtti hann í embæti mítt, og hann hongdi hann.

14 ¶ Tá sendi Pharaoh og kallaði Jóseph, og teir fórdu hann skundisligani út úr fangatippinum: og hann rakaði *sær,* og skifti klædnað sín, og kom inn til Pharaohs.

15 Og Pharaoh segði við Jóseph, Meg hevur droymt ein dreym, og *tað er* eingin sum kann týða hann: og eg havi hoyrt sagt um teg, *at* tú kanst skilja ein dreym til at týða hann.

16 Og Jóseph svaraði Pharaoh, sigandi, *Tað er* ikki í mær: Guð skal geva Pharaoh eitt friðarsvar.

17 Og Pharaoh segði við Jóseph, Í mínum dreymi, sí, eg stóð uppiá áarbakkanum:

18 Og sí, tað komu upp út úr ánni sjey kýr, feit-kjøtaðar og væl vaksnar; og tær *gingu* á biti á eini ong:

19 Og sí, sjey aðrar kýr komu upp aftaná tær, armar og sera illa vaksnar og rak-kjøtaðar, slíkar sum eg aldri sá í øllum Egyptalandi fyri vánaligsemi:

20 Og tær raku og tær illa vaksnu kýrnar ótu upp hinar fyrstu sjey feitu kýrnar:

21 Og tá ið tær høvdu etið tær upp, kundi tað ikki vitast, at tær høvdu etið tær; men tær *vóru* enn illa vaksnar, eins og at byrja við. Tá vaknaði eg.

22 Og eg sá í dreymi mínum, og sí, sjey øks komu upp á ēinum strái, tjúkk og góð:

23 Og sí, sjey øks, følnað, kløn, *og* sviðin við eystanvindinum, spruttu upp aftaná tey:

24 Og tey kløntu øksini gloyptu tey sjey góðu øksini: og eg taldi gandakøllunum *hetta;* men *tað var* eingin sum kundi klárleggja *tað* fyri mær.

25 ¶ Og Jóseph segði við Pharaoh, Pharaohs dreymur *er* ēin: Guð hevur sýnt Pharaoh tað *sum* hann *er* um *at fara* at gera.

26 Tær sjey góðu kýrnar *eru* sjey ár; og tey sjey góðu øksini *eru* sjey ár: dreymurin *er* ēin.

27 Og tær sjey kløndu og illa vaksnu kýrnar, sum komu upp aftaná tær, *eru* sjey ár; og tey sjey tómu øksini, sviðin við eystanvindinum, skulu vera sjey ár av hungursneyð.

28 Hetta *er* tað tingið sum eg havi talað yvirat Pharaoh: Tað, *sum* Guð *er* um *at fara* at gera, sýnir hann yvirfyri Pharaoh.

29 Sí, tað koma sjey ár av miklum ríkiligleika út gjøgnum alt Egyptaland:

30 Og tað skulu rísa *upp* aftaná tey sjey ár av hungursneyð; og øll nøgdin skal verða gloymd í Egyptalandi; og hungursneyðin skal eta upp landið;

31 Og ríkiligleikin skal ikki verða kunnur í landinum uppá grund av hasi hungursneyðini fylgjandi; tí at hon *skal vera* sera svárlig.

32 Og fyri *tað,* at dreymurin varð tvífaldaður at Pharaoh tværreisur; *tað er* av tí at luturin *er* grundfestur av Guði, og Guð vil fljótligani fáa hann at bera á.

33 Nú tessvegna, lat Pharaoh leita fram ein mann, hygnan og vísan, og seta hann yvir Egyptalandi.

34 Lat Pharaoh gera *hetta,* og lat hann útnevna embætismenn yvir landinum, og taka upp fimtapartin av Egyptalandi í teimum sjey ríkiligu árunum.

35 Og lat teir savna allan matin av hasum góðu árunum sum koma, og leggja niðurfyri korn undir hond Pharaohs, og lat teir goyma mat í staðunum.

36 Og tann maturin skal verða til inniløgu hjá landinum ímóti teimum sjey árunum av hungursneyð, sum skulu verða í Egyptalandi; at landið farist ikki gjøgnum hungursneyðina.

37 ¶ Og luturin var góður í eygum Pharaohs, og í eygunum á øllum tænarum hansara.

38 Og Pharaoh segði við tænarar sínar, Kunnu vit finna *ein slíkan ēin* sum hesin *er,* ein mann, í hvørjum Andi Guðs *er?*

39 Og Pharaoh segði við Jóseph, Við tað at Guð hevur sýnt tær alt hetta, *er tað* eingin so hyggin og vísur sum tú *ert:*

40 Tú skalt vera yvir húsi mínum, og sambært orði tínum skal alt mitt fólk verða stjórnað: einans í hásætinum vil eg vera miklari enn tú.

41 Og Pharaoh segði við Jóseph, Sí, eg havi sett teg yvir øllum Egyptalandi.

42 Og Pharaoh tók av ring sín frá hond síni, og koyrdi hann uppá hond Jósephs, og skrýddi hann í klædnakappar av fínum líni, og koyrdi eina gullketu um háls hansara;

43 Og hann fekk hann at ríða í hinum øðrum vagninum sum hann hevði; og teir róptu undan honum, Boyggið knæið: og hann gjørdi hann *til stjórnara* yvir øllum Egyptalandi.

44 Og Pharaoh segði við Jóseph, Eg *eri* Pharaoh, og uttan teg skal eingin maður lyfta upp sína hond ella fót í øllum Egyptalandi.

45 Og Pharaoh kallaði Jósephs navn Zăph′-năth-pâ-â-nē′-ăh; og hann gav honum til konu Ăs′-ē-năth, dóttur Pô-tī-phēr′-ăh prests í Ón. Og Jóseph fór út yvir *alt* Egyptaland.

46 ¶ Og Jóseph *var* tríati ára gamalur, tá ið hann stóð frammi fyri Pharaoh kongi av Egyptalandi. Og Jóseph fór út frá nærveru Pharaohs, og fór út gjøgnum alt Egyptaland.

47 Og í teimum sjey ríkiligu árunum bar jørðin fram í hondfullum.

48 Og hann savnaði upp allan matin av teimum sjey árunum sum vóru í Egyptalandi, og legði niðurfyri matin í staðirnar: matin

av markini, sum *var* rundan um hvønn stað, legði hann niðurfyri í hinum sama.

49 Og Jóseph savnaði korn sum sand havsins, sera nógv, inntil hann lætti av at telja; tí at *tað var* uttan tal.

50 Og Jósephi vórðu føddir tveir synir áðrenn árini av hungursneyð komu, hvørjar Ás´-ĕ-năth, dóttir Pô-tī-phĕr´-ăh prests í On, føddi honum.

51 Og Jóseph kallaði navnið hjá tí fyrstafødda Mă-năs´-sĕh: Tí at Guð, *segði hann,* hevur fingið meg *at* gloyma alt strev mítt, og alt hús faðirs míns.

52 Og navnið hjá hinum øðrum kallaði hann Ē´-phră-ĭm: Tí at Guð hevur elvt mær at vera fruktagóður í landinum av míni nívd.

53 ¶ Og tey sjey árini av ríkiligleika, sum var í Egyptalandi, vóru endaði.

54 Og tey sjey árini av halli byrjaðu at koma, samsvarandi sum Jóseph hevði sagt: og hallið var í øllum londum; men í øllum Egyptalandi var breyð.

55 Og tá ið alt Egyptaland var úthungrað, rópaði fólkið til Pharaohs eftir breyði: og Pharaoh segði við allar Egyptarnar, Farið til Jósephs; tað, *sum* hann sigur til tykkara, gerið.

56 Og hungursneyðin var yvir alla ásjón jarðarinnar: og Jóseph læt upp øll goymsluhúsini, og seldi Egyptunum; og hungursneyðin gjørdist svár í Egyptalandi.

57 Og øll lond komu inn í Egyptaland til Jósephs fyri at keypa *korn;* av tí at hungursneyðin var *so* svár í øllum londum.

KAPITUL 42

NÚ, tá ið Jákob sá, at tað var korn í Egyptalandi, segði Jákob við synir sínar, Hví hyggja tit hvør uppá annan?

2 Og hann segði, Sí, eg havi hoyrt, at tað er korn í Egyptalandi: sleppið tykkum niður hagar, og keypið til okkara haðani frá; at vit mega liva, og ikki doyggja.

3 ¶ Og Jósephs tíggju brøður fóru niður at keypa korn í Egyptalandi.

4 Men Benjamin, bróður Jósephs, sendi Jákob ikki við brøðrum hansara; tí hann segði, At ikki møguliga mein viðurfari honum.

5 Og synir Ísraels komu at keypa *korn* millum teirra sum komu: tí at hungursneyðin var í landi Cānaans.

6 Og Jóseph *var* landsstjórin yvir landinum, *og* hann *tað var* sum seldi til alt fólk landsins: og Jósephs brøður komu, og boygdu niður seg sjálvar frammi fyri honum *við* andlitum sínum til jarðarinnar.

7 Og Jóseph sá brøður sínar, og hann kendi teir, men gjørdi seg sjálvan fremmandan at teimum, og talaði knortlasligani við teir; og hann segði við teir, Hvaðani koma tit? Og teir søgdu, Frá landi Cānaans at keypa mat.

8 Og Jóseph kendi brøður sínar, men teir kendu ikki hann.

9 Og Jóseph mintist dreymarnar, sum hann droymdi um teir, og segði við teir, Tit *eru* njósnarar; til at síggja landsins nakni eru tit komnir.

10 Og teir søgdu við hann, Nei, harri mín, men at keypa mat eru tænarar tínir komnir.

11 Vit *eru* allir synir ēins mans; vit *eru* sannir *menn,* tænarar tínir eru eingir njósnarar.

12 Og hann segði við teir, Nei, men til at síggja landsins nakni eru tit komnir.

13 Og teir søgdu, Tænarar tínir *eru* tólv brøður, synir ēins mans í landi Cānaans; og sí, hin yngsti *er* henda dag hjá faðir okkara, og ēin *er* ikki.

14 Og Jóseph segði við teir, Tað *er tað* sum eg talaði við tykkum, sigandi, Tit *eru* njósnarar:
15 Við^ hesum skulu tit verða royndir: Við lív Pharaohs skulu tit ikki fara fram hiðani, uttan yngsti bróðir tykkara komi higar.
16 Sendið ēin av tykkum, og lat hann heinta bróður tykkara, og tit skulu verða hildnir í fongsli, at orð tykkara mega verða roynd, hvørt *tað veri nakar* sannleiki í tykkum: ella annars, við Pharaohs lív, vissuliga, tit *eru* njósnarar.
17 Og hann koyrdi teir allar samlar inn í varðhald tríggjar dagar.
18 Og Jóseph segði við teir hin triðja dagin, Hetta gerið, og livið; *tí at* eg óttist Guð:
19 Um tit *veri* sannir *menn*, latið ēin av brøðrum tykkara verða bundnan í húsi fongsuls tykkara: farið tit, berið korn fyri hungursneyðina hjá húsum tykkara:
20 Men førið yngsta bróður tykkara til mín; so skulu orð tykkara verða sannaði, og tit skulu ikki doyggja. Og teir so gjørdu.
21 ¶ Og teir søgdu hvør til annan, Vit *eru* sanniligani sekir viðvíkjandi bróður okkara, í at vit sóu angistina av hansara sál, tá ið hann bønaði okkum, og vit vildu ikki hoyra; tí er henda neyðin komin uppá okkum.
22 Og Reūben svaraði teimum, sigandi, Talaði eg ikki við tykkum, sigandi, Syndið ikki ímóti barninum; og tit vildu ikki hoyra? tessvegna, sí, eisini blóð hansara verður kravt.
23 Og teir vitstu ikki, at Jóseph skilti *teir;* tí at hann talaði við teir við^ einum tolki.
24 Og hann vendi sær umkring frá teimum, og græt; og vendi aftur til teirra aftur, og samtalaði við teir, og tók frá teimum Símeon, og bant hann frammi fyri eygum teirra.
25 ¶ Tá skipaði Jóseph at fylla teirra sekkir við korni, og at endurbøta hvørs mans pening inn í sekk hansara, og at geva teimum vistir til vegin: og svá gjørdi hann teimum.
26 Og teir løddu asnar sínar við korni, og hildu avstað haðani.
27 Og sum ēin av teimum opnaði sekk sín til at geva asna sínum fóður í tilhaldinum, skimaði hann pening sín; tí at sí, hann *var* í sekkjarmunna hansara.
28 Og hann segði við brøður sínar, Peningur mín er endurbøttur; og sí, *hann er* enntá í sekki mínum: og teirra hjarta bilaði *teimum,* og teir vórðu ræddir, sigandi hvør til annan, Hvat *er* hetta *sum* Guð hevur gjørt okkum?
29 ¶ Og teir komu at Jákobi, faðir sínum, at landi Cānaans, og taldu honum alt sum viðurfór teimum; sigandi,
30 Maðurin, *sum er* harri landsins, talaði knortlasliga til okkara, og tók okkum fyri njósnarar av landinum.
31 Og vit søgdu við hann, Vit *eru* sannir *menn;* vit eru eingir njósnarar:
32 Vit *veri* tólv brøður, synir faðirs okkara; ēin *er* ikki, og hin yngsti *er* henda dag hjá faðir okkara í landi Cānaans.
33 Og maðurin, harri landsins, segði við okkum, Við^ hesum skal eg vita, at tit *eru* sannir *menn;* eftirlatið ēin av tykkara brøðrum *her* hjá mær, og takið *mat fyri* hungursneyðina hjá tykkara húsholdum, og verið farnir:
34 Og førið yngsta bróður tykkara at mær: tá skal eg vita, at tit *eru* eingir njósnarar, men *at* tit *eru* sannir *menn: so* vil eg lata tykkum bróður tykkara, og tit skulu handla í landinum.

35 ¶ Og tað bar á, sum teir tømdu sekkir sínar, at sí, hvørs mans bundi av peningi *var* í sekki hansara: og tá ið *bæði* teir og faðir teirra sóu bundini av peningi, vórðu teir ræddir.

36 Og faðir teirra, Jákob, segði við teir, Meg hava tit rænt *fyri børn míni:* Jóseph *er* ikki, og Símeon *er* ikki, og tit vilja taka Benjamin *burtur:* øll hesi tingini eru ímóti mær.

37 Og Reuben talaði við faðir sín, sigandi, Veg báðar synir mínar, um eg føri hann ikki til tín: lat hann inn í hond mína, og eg vil føra hann til tín aftur.

38 Og hann segði, Sonur mín skal ikki fara niður við tykkum; tí at bróðir hansara er deyður, og hann er einsamallur eftir: um mein viðurfari honum eftir veginum, á hvørjum tit fara, tá skulu tit føra niður míni gráu hár við sorg til gravarinnar.

KAPITUL 43

OG hungursneyðin *var* svár í landinum.

2 Og tað bar á, tá ið teir høvdu etið upp kornið sum teir høvdu ført út úr Egyptalandi, segði faðir teirra við teir, Farið aftur, keypið okkum eitt sindur *av* mati.

3 Og Judah talaði við hann, sigandi, Maðurin álvarsamligani staðfesti at okkum, sigandi, Tit skulu ikki síggja mítt andlit, uttan bróðir tykkara *veri* við tykkum.

4 Um tú vilt senda bróður okkara við okkum, vilja vit fara niður og keypa tær mat:

5 Men um tú vilt ikki senda *hann,* vilja vit ikki fara niður: tí at maðurin segði við okkum, Tit skulu ikki síggja mítt andlit, uttan bróðir tykkara *veri* við tykkum.

6 Og Ísrael segði, Hví fóru tit *so* illa við mær, *sum* at siga manninum hvørt tit høvdu uppaftur ein bróður?

7 Og teir søgdu, Maðurin spurdi okkum gjølla um okkara støðu, og um ættarfólk okkara, sigandi, *Er* faðir tykkara enn á lívi? hava tit *ein annan* bróður? og vit søgdu honum samsvarandi við gongdina á hesum orðum: kundu vit vissuliga vita, at hann vildi siga, Førið bróður tykkara niður?

8 Og Judah segði við Ísrael, faðir sín, Send piltin við mær, og vit vilja reisast og fara; at vit mega liva, og ikki doyggja, bæði vit, og tú, *og* eisini hini smáu okkara.

9 Eg vil vera pantur fyri hann; av míni hond skalt tú krevja hann: um eg føri hann ikki at tær, og seti hann frammanfyri tær, tá lat meg bera skyldina um ævir:

10 Tí at uttan vit høvdu drálað, vissuliga nú høvdu vit komið aftur hetta annað skifti.

11 Og faðir teirra, Ísrael, segði við teir, Um *tað má vera* so nú, gerið hetta; takið av teimum bestu ávøkstunum í landinum í tykkara íløt, og berið niður manninum eina gávu, eitt sindur av balsami, og eitt sindur av hunangi, kryddurtir, og myrrhu, nøtur, og mandlur:

12 Og takið tvífaldan pening í hond tykkara; og peningurin, sum varð førdur aftur í munnanum á sekkjum tykkara, berið *hann* aftur í hond tykkara; vera má *var* tað vansketni:

13 Takið eisini bróður tykkara, og reisist, farið aftur at manninum:

14 Og Guð Almáttugi gevi tykkum miskunn frammi fyri manninum, at hann má senda avstað hīn bróður tykkara, og Benjamin. Um eg verði rændur *fyri børn míni, so* verði eg rændur.

15 ¶ Og menninir tóku ta gávuna, og teir tóku tvífaldan pening í sína hond, og Benjamin; og risu upp, og fóru niður til Egyptalands, og stóðu frammi fyri Josephi.

16 Og tá ið Jóseph sá Benjamin við teimum, segði hann til stjórnaran av húsi sínum, Før *hesar* menn heim, og slátra, og ger tilreiðar; tí at *hesir* menninir skulu eta við mær á middegi.

17 Og maðurin gjørdi sum Jóseph skipaði; og maðurin førdi menninar inn í Jósephs hús.

18 Og menninir vóru ræddir, av tí at teir vórðu førdir inn í Jósephs hús; og teir søgdu, Uppá grund av peninginum, sum varð borin aftur í sekkjum okkara við hitt fyrsta skifti, eru vit førdir inn; at hann má søkja høvi ímóti okkum, og falla uppá okkum, og taka okkum til trælmenn, og asnar okkara.

19 Og teir komu nær til bústjóran av húsi Jósephs, og teir samtalaðu við hann við dyrnar á húsinum,

20 Og søgdu, O tygum, vit komu víst niður við hitt fyrsta skifti at keypa mat:

21 Og tað bar á, tá ið vit komu til tilhaldið, at vit opnaðu sekkir okkara, og sí, *hvørs* mans peningur *var* í munnanum av sekki hansara, okkara peningur í fullari vekt: og vit hava ført hann aftur í hond okkara.

22 Og annan pening hava vit ført niður í hondum okkara til at keypa mat: vit duga ikki *at* siga, hvør koyrdi okkara pening í sekkir okkara.

23 Og hann segði, Friður *veri* til tykkara, óttist ikki: Guð tykkara, og Guð faðirs tykkara, hevur givið tykkum dýrgrip í sekkir tykkara: eg hevði pening tykkara. Og hann førdi Símeon út til teirra.

24 Og maðurin førdi menninar inn í Jósephs hús, og gav *teimum* vatn, og teir tvógu føtur sínar; og hann gav teirra asnum fóður.

25 Og teir gjørdu tilreiðar gávuna ímóti *ti, at* Jóseph kom á middegi: tí at teir hoyrdu, at teir skuldu eta breyð har.

26 ¶ Og tá ið Jóseph kom heim, bóru teir honum gávuna, sum *var* í teirra hond, inn í húsið, og boygdu seg sjálvar fyri honum til jarðarinnar.

27 Og hann spurdi teir um *teirra* trivnað, og segði, *Veit* faðir tykkara væl *við,* tí gamla mannin, um hvønn tit talaðu? *Er* hann enn á lívi?

28 Og teir svaraðu, Tín tænari, faðir okkara, *er* við góða heilsu, hann *er* enn á lívi. Og teir boygdu niður síni høvur, og intu heiðurslútan.

29 Og hann lyfti upp eygum sínum, og sá bróður sín Benjamin, son móður sínar, og segði, *Er* hesin tykkara yngri bróðir, um hvønn tit talaðu við meg? Og hann segði, Guð veri náðisamur at tær, sonur mín.

30 Og Jóseph skundaði sær; tí hansara innangoymslur longdust yvir bróður hansara: og hann søkti *hvar* at gráta; og hann innfór inn í kamar *sítt,* og grætt har.

31 Og hann tvó andlit sítt, og fór út, og baraði sær, og segði, Setið breyð á.

32 Og teir settu á til hansara fyri seg sjálvan, og til teirra fyri seg sjálvar, og til Egyptanna, sum ótu við honum, fyri seg sjálvar: av tí at Egyptarnir máttu ikki etið breyð við Hebrēarunum; tí at tað *er* Egyptunum andstygd.

33 Og teir sótu frammi fyri honum, hin frumborni samsvarandi við burðarrætt hansara, og hin yngsti samsvarandi við ungdóm hansara: og menninir undraðust hvør at øðrum.

34 Og hann tók *og sendi* verðir til teirra frammanfyri sær ífrá: men Benjamins verður var fimm ferðir so nógvur sum nakar av teirra. Og teir drukku, og vóru kátir við honum.

KAPITUL 44

OG hann skipaði bústjóranum av húsi sínum, sigandi, Fyll sekkirnar hjá monnunum *við* mati, so nógv sum teir kunnu bera, og koyr hvørs mans pening í sekkjarmunna hans.

2 Og koyr bikar mítt, silvur bikarið, í sekkjarmunnan hjá tí yngsta, og hansara korn-pening. Og hann gjørdi samsvarandi við orðið sum Jóseph hevði talað.

3 So skjótt sum morgunin var ljósur, vórðu menninir sendir avstað, teir og asnar teirra.

4 *Og* tá ið teir vóru farnir út úr staðinum, *og* ikki *enn* langt burturi, segði Jóseph við bústjóra sín, Upp, fylg aftaná monnunum; og tá ið tú innheintart teir, sig við teir, Hvørsvegna hava tit lønt ilt fyri gott?

5 *Er* ikki hetta *tað,* í hvørjum harri mín drekkur, og við hvørjum í roynd *og veru* hann spáar? tit hava gjørt ilt í so at gera.

6 ¶ Og hann innheintaði teir, og hann talaði við teir hesi somu orð.

7 Og teir søgdu við hann, Hví sigur harri mín hesi orð? Guð sýti *fyri,* at tænarar tínir skuldu gjørt samsvarandi við henda lut:

8 Sí, peningin, sum vit funnu í sekkjamunnum okkara, førdu vit aftur til tín út úr landi Cānaans: hvussu skuldu vit tá stjolið út úr húsi harra tíns silvur ella gull?

9 Hjá hvørjumsumhelst av tínum tænarum *við* tað verði funnið, bæði lat hann doyggja, og vit eisini vilja verða trælmenn harra míns.

10 Og hann segði, Nú eisini *lat* tað *verða* samsvarandi við orð tykkara: hann, hjá hvørjum tað verður funnið, skal verða tænari mín; og tit skulu vera ólastandi.

11 Tá tóku teir snarliga niður hvør maður sekk sín til jarðarinnar, og lótu upp hvør maður sekk sín.

12 Og hann leitaði, *og* byrjaði við hinum elsta, og gavst við tí yngsta: og bikarið varð funnið í sekki Benjamins.

13 Tá skræddu teir klæðir síni, og løddu hvør maður asna sín, og vendu aftur til staðarins.

14 ¶ Og Judah og brøður hansara komu til húsar Jósephs; tí at hann *var* enn har: og teir fullu frammi fyri honum á jørðina.

15 Og Jóseph segði við teir, Hvør gerð *er* hetta, sum tit hava gjørt? vita tit ikki, at ein slíkur maður sum eg dugir víst *at* spáa?

16 Og Judah segði, Hvat skulu vit siga við harra mín? hvat skulu vit tala? ella hvussu skulu vit reinsa okkum sjálvar? Guð hevur funnið útav misgerð tænara tína: sí, vit *eru* tænarar harra míns, bæði vit, og *hann* eisini, hjá hvørjum bikarið er funnið.

17 Og hann segði, Guð sýti *fyri,* at eg skuldi gjørt so: *men* tann maðurin, í hvørs hond bikarið er funnið, hann skal vera tænari mín; og hvat tykkum varðar, komið tykkum upp í friði at faðir tykkara.

18 ¶ Tá kom Judah nær at honum, og segði, Á, harri mín, lat tænara tín, eg biði teg, tala eitt orð í oyru harra míns, og lat ikki tína firtni brenna ímóti tænara tínum: tí at tú *ert* enntá eins og Pharaoh.

19 Mín harri spurdi tænarar sínar, sigandi, Hava tit ein faðir, ella ein bróðir?

20 Og vit søgdu við harra mín, Vit hava ein faðir, ein gamlan mann, og eitt barn gamla aldurs hansara, ein lítlan ēin; og bróðir hansara er deyður, og hann einsamallur er eftir frá móður síni, og faðir hansara elskar hann.

21 Og tú segðirt við tænarar

tínar, Førið hann niður at mær, at eg má seta míni eygu uppá hann.

22 Og vit søgdu við harra mín, Pilturin kann ikki yvirgeva faðir sín: tí at *um* hann skuldi yvirgivið faðir sín, vildi *faðir hansara* doyð.

23 Og tú segðirt við tænarar tínar, Uttan yngsti bróðir tykkara komi niður við tykkum, skulu tit síggja mítt andlit ei meira.

24 Og tað bar á, tá ið vit komu upp til tænara tíns, faðirs míns, søgdu vit honum orðini hjá harra mínum.

25 Og faðir okkara segði, Farið aftur, *og* keypið okkum eitt sindur *av* mati.

26 Og vit søgdu, Vit kunnu ikki fara niður: um yngsti bróðir okkara veri við okkum, tá vilja vit fara niður: tí at vit mega ikki síggja andlit mansins, uttan yngsti bróðir okkara *veri* við okkum.

27 Og tænari tín, faðir mín, segði við okkum, Tit vita, at kona mín føddi mær tveir *synir:*

28 Og tann ēini fór út frá mær, og eg segði, Vissuliga, hann er skræddur í stykkir; og eg sá hann ikki síðan:

29 Og um tit taki hendan eisini frá mær, og mein viðurfari honum, skulu tit føra niður míni gráu hár við sorg til grøvina.

30 Nú tessvegna, tá ið eg komi til tænara tíns, faðirs míns, og pilturin *veri* ikki við okkum; við tað at hansara lív er bundið upp í lívið hjá piltinum;

31 Skal tað bera á, tá ið hann sær at pilturin *er* ikki *við okkum,* at hann vil doyggja: og tænarar tínir skulu føra niður gráu hárini hjá tænara tínum, faðir okkara, við sorg til grøvina.

32 Tí at tænari tín gjørdist pantur fyri piltin at faðir mínum, sigandi, Um eg føri hann ikki til tín, so skal eg bera skyldina móti faðir mínum um ævir.

33 Nú tessvegna, eg biði teg, lat tænara tín verða *verandi* ístaðin fyri piltin *til* eitt trælmenni fyri harra mínum; og lat piltin fara upp við brøðrum sínum.

34 Tí at hvussu skal eg fara upp til faðirs míns, og pilturin *veri* ikki við mær? at ikki møguligvís eg síggi hitt illa sum skal koma á faðir mín.

KAPITUL 45

TÁ kundi Jóseph ikki bara sær frammi fyri øllum teimum sum stóðu hjá honum; og hann rópti, Voldið hvørjum manni at fara út frá mær. Og tað stóð eingin maður hjá honum, meðan Jóseph gjørdi seg kunnan yvirfyri brøðrum sínum.

2 Og hann græt hart: og Egyptarnir og Pharaohs hús hoyrdu.

3 Og Jóseph segði við brøður sínar, Eg *eri* Jóseph; livir faðir mín enn? Og hansara brøður fingu ikki svarað honum; tí at teir vóru órógvaðir yvir nærveru hansara.

4 Og Jóseph segði við brøður sínar, Komið nær til mín, eg biði tykkum. Og teir komu nær. Og hann segði, Eg *eri* Jóseph, bróðir tykkara, hvønn tit seldu inn í Egyptaland.

5 Nú tessvegna, verið ikki harmir, ella firtnir við tykkum sjálvar, at tit seldu meg higar: tí at Guð sendi meg undan tykkum *fyri* at varðveita lív.

6 Tí at hesi tvey árini *hevur* hungursneyðin *verið* í landinum: og enn *eru tað* fimm ár, í hvørjum *tað skal* hvørki *verða* pløging ella heyst.

7 Og Guð sendi meg undan tykkum *fyri* at varðveita tykkum eina eftirslekt á jørðini, og *fyri* at frelsa tykkara lív˙ við^ eini miklari útfrían.

8 So nú, *tað var* ikki tit *sum* sendu meg higar, men Guð: og hann hevur gjørt meg *til* ein faðir

fyri Pharaoh, og harra hjá øllum húsi hansara, og ein stjórnara út gjøgnum alt Egyptaland.

9 Skundið tykkum, og farið upp til faðirs míns, og sigið við hann, Svá sigur sonur tín Jóseph, Guð hevur gjørt meg *til* harra hjá øllum Egyptalandi: kom niður til mín, drála ikki:

10 Og tú skalt búgva í landi Gō´-sjēn-s, og tú skalt vera nær at mær, tú, og børn tíni, og barnabørn tíni, og tíni smáfæafylgir, og tíni stórfæafylgir; og alt sum tú hevurt:

11 Og har vil eg uppihalda tær; tí at enn *eru* fimm ár av hungursneyð; at ikki tú, og húshald títt, og alt sum tú hevurt, komi til fátæktar.

12 Og sí, tykkara eygu síggja, og eygu bróður míns Benjamins, at *tað er* munnur mín sum talar við tykkum.

13 Og tit skulu siga faðir mínum um alla mína dýrd í Egyptalandi, og um alt sum tit hava sæð; og tit skulu skunda *tykkum* og føra niður faðir mín higar.

14 Og hann fell uppá háls bróður síns Benjamins, og græt; og Benjamin græt uppiá hálsi hansara.

15 Haraftrat kysti hann allar bræður sínar, og græt uppiá teimum: og eftir tað talaðu bræður hansara við hann.

16 ¶ Og tess giti varð hoyrt í Pharaohs húsi, sigandi, Brøður Josephs eru komnir: og tað toknaði Pharaoh væl, og hansara tænarum.

17 Og Pharaoh segði við Jóseph, Sig við bræður tínar, Hetta gerið tit; løðið djór˘ tykkara, og farið, komið tykkum til Cānaans lands;

18 Og takið faðir tykkara og húshøld tykkara, og komið til mín: og eg vil geva tykkum tað góða hjá Egyptalandi, og tit skulu eta fiti landsins.

19 Nú er tær skipað, hetta gerið tit; takið tykkum vagnar út úr Egyptalandi til hini smáu tykkara, og til konur tykkara, og førið faðir tykkara, og komið.

20 Eisini gevið ikki far um tingini hjá tykkum; tí at tað góða hjá øllum Egyptalandi *er* tykkara.

21 Og Ísraels børn so gjørdu: og Jóseph gav teimum vagnar, samsvarandi við ábjóðing Pharaohs, og gav teimum vistir til vegin.

22 Til teir allar gav hann hvørjum manni skiftir av klædnaði; men til Benjamin gav hann trý hundrað *stykkir* av silvuri, og fimm skiftir av klædnaði.

23 Og til faðir sín sendi hann eftir hesum *háttarlagi;* tíggju asnar, løddar við hinum góðu tingum Egyptalands; og tíggju øsnur, løddar við korni og breyði og mati til faðir sín eftir veginum.

24 So hann sendi bræður sínar avstað, og teir fóru avstað: og hann segði við teir, Síggið til, *at* tit gerist ikki óklárir eftir veginum.

25 ¶ Og teir fóru upp út úr Egyptalandi, og komu inn í land Cānaans til Jákobs, faðirs síns,

26 Og søgdu honum, sigandi, Jóseph *er* enn livandi, og hann *er* landsstjóri yvir øllum Egyptalandi. Og Jákobs hjarta svann, tí at hann trúði teimum ikki.

27 Og teir søgdu honum øll orðini hjá Jósephi, sum hann hevði sagt teimum: og tá ið hann sá vagnarnar, sum Jóseph hevði sent til at bera hann, endurlívgaðist andi faðirs teirra Jákobs:

28 Og Ísrael segði, *Tað er* nóg mikið; Jóseph, sonur mín, *er* enn livandi: eg vil fara og síggja hann, áðrenn eg doyggi.

KAPITUL 46

OG Ísrael tók ferð sína við øllum sum hann hevði, og kom til Bēēr´-sjē-bū, og ofraði sláturoffur˘ at Guði faðirs síns Ísaaks.

2 Og Guð talaði innat Ísrael
í sjónum náttarinnar, og segði,
Jákob, Jákob. Og hann segði,
Her *eri* eg.
3 Og hann segði, Eg *eri* Guð,
Guð faðirs tíns: óttast ikki at
fara niður í Egyptaland; tí at eg
vil har gera úr tær eina mikla
tjóð:
4 Eg vil fara niður við tær inn í
Egyptaland; og eg vil eisini vissuliga føra teg upp *aftur:* og Jóseph
skal leggja hond sína uppá eygu
tíni.
5 Og Jákob reis upp frá Bēēr-
sjē-bŭ: og synir Ísraels bóru Jákob, faðir sín, og hini smáu síni,
og konur sínar, í vagnunum sum
Pharaoh hevði sent at bera hann.
6 Og teir tóku fenað sín, og
góðs sítt, sum teir høvdu skaffað
í landi Cānaans, og komu inn í
Egyptaland, Jákob, og alt sáð
hansara við honum:
7 Synir hansara, og synir sona
hansara við honum, døtur hansara, og døtur sona hansara, og alt
sítt sáð førdi hann við sær inn í
Egyptaland.
8 ¶ Og hesi *eru* nøvn Ísraels
barna, sum komu inn í Egyptaland, Jákob og synir hansara: Reûben, frumborni Jákobs.
9 Og synir Reûbens; Há-nŏch,
og Phăl-lû, og Hĕz-rŏn, og Câr-mī.
10 ¶ Og synir Símeons; Jē-mû-ĕl, og Já-mĭn, og Ó-hăd, og
Já-chĭn, og Zō-hâr; og Sjā-ŭl,
sonurin hjá eini Cānaanitiskari
kvinnu.
11 ¶ Og synir Levīs; Gĕr-sjŏn,
Kō-hăth, og Mĕ-râr-ī.
12 ¶ Og synir Judah; Êr, og Ó-nān, og Sjē-lâh, og Phâr-ĕz, og
Zêr-âh: men Êr og Ó-nān doyðu
í landi Cānaans. Og synir Phâr-ĕz-ar vóru Hĕz-rŏn og Hám-ŭl.
13 ¶ Og synir Ĭs-să-châr-s; Tō-lă, og Phū-vâh, og Job, og Sjĭm-rŏn.
14 ¶ Og synir Zē-bŭ-lŏn-s; Sē-rĕd, og Ē-lŏn, og Jáh-lēēl.
15 Hesir *veri* synir Leuh, sum
hon føddi Jákobi í Pá-dăn-ár-ăm,
við dóttur hansara Dinuh: allar
sálir sona hansara og døtra hansara *vóru* tríati og tríggjar.
16 ¶ Og synir Gáds; Zĭph-ī-ŏn, og Hăg-gī, Sjū-nī, og Ēz-bŏn,
Ē-rī, og Á-rō-dī, og Á-rē-lī.
17 ¶ Og synir Ásjers; Jĭm-năh,
og Ĭsj-û-ăh, og Ĭs-û-ī, og Bē-rī-ăh,
og Sē-răh teirra systir: og synir
Bē-rī-ăh; Hē-bĕr, og Măl-chī-ĕl.
18 Hesir *eru* synir Zilpuh,
hvørja Lában gav til Leuh, dóttur
sína, og hesar føddi hon Jákobi,
enntá sekstan sálir.
19 Synir Rachelar, konu Jákobs; Jóseph, og Benjamin.
20 ¶ Og Jósephi í Egyptalandi
vórðu føddir Mă-năs-sēh og Ē-phră-ĭm, hvørjar Ás-ē-năth, dóttir
Pô-tī-phēr-ăh prests úr Ón, føddi
honum.
21 ¶ Og synir Benjamins *vóru*
Bē-lăh, og Bē-chĕr, og Ásj-bĕl,
Gē-rā, og Ná-ă-măn, Ē-hī, og
Rŏsj, Mŭp-pĭm, og Hŭp-pĭm, og
Ârd.
22 Hesir *eru* synir Rachelar,
sum vórðu føddir til Jákobs: allar
sálirnar *vóru* fjúrtan.
23 ¶ Og synir Dáns; Hū-sjĭm.
24 ¶ Og synir Năph-tâ-lī-s; Jáh-zēēl, og Gū-nī, og Jē-zĕr, og Sjĭl-lĕm.
25 Hesir *eru* synir Bĭl-hŭh,
hvørja Lában gav Racheli, dóttur
síni, og hon føddi Jákobi hesar:
allar sálirnar *vóru* sjey.
26 Allar sálirnar sum komu
við Jákobi inn í Egyptaland, sum
komu út úr lendum hansara, umframt konurnar hjá sonum Jákobs, allar sálirnar *vóru* trísinstjúgu og seks;
27 Og synirnir hjá Jósephi, sum
vórðu føddir honum í Egyptalandi, *vóru* tvær sálir: allar sálirnar av húsi Jákobs, sum komu

inn í Egyptaland, *vóru* trísinstjúgu og tíggju.

28 ¶ Og hann sendi Judah undan sær til Jósephs, at beina andliti sínum til Gō´-sjěn; og teir komu inn í land Gō´-sjěn-s.

29 Og Jóseph gjørdi tilreiðar vagn sín, og fór upp at møta Ísrael, faðir sínum, til Gō´-sjěn, og framsetti seg sjálvan at honum; og hann fell á háls hansara, og græt á hálsi hansara eina góða stund.

30 Og Ísrael segði við Jóseph, Nú lat meg doyggja, síðan eg havi sæð andlit títt, av tí at tú *ert* enn livandi.

31 Og Jóseph segði við brøður sínar, og við hús faðirs síns, Eg vil fara upp, og sýna Pharaoh, og siga við hann, Brøður mínir, og hús faðirs míns, sum *vóru* í landi Cānaans, eru komnir at mær;

32 Og menninir *eru* hirðar, tí at teirra vinna hevur verið at føða fenað; og teir eru komnir við sínum smáfæafylgjum, og sínum stórfæafylgjum, og øllum sum teir hava.

33 Og tað skal bera á, tá ið Pharaoh skal kalla tykkum, og skal siga, Hvat *er* yrki tykkara?

34 At tit skulu siga, Vinnan hjá tænarum tínum hevur verið kring fenað frá ungdómi várum enntá inntil nú, bæði vit, *og* eisini fedrar várir: at tit mega dvøljast í landi Gō´-sjěn-s; tí at hvør hirði *er* ein andstygd at Egyptunum.

KAPITUL 47

SO kom Jóseph og segði Pharaoh frá, og segði, Faðir mín og brøður mínir, og teirra smáfæafylgir, og teirra stórfæafylgir, og alt sum teir hava, eru komnir út úr landi Cānaans; og sí, teir *eru* í landi Gō´-sjěn-s.

2 Og hann tók nakrar av brøðrum sínum, *enntá* fimm menn, og framsetti Pharaoh teir.

3 Og Pharaoh segði við brøður hansara, Hvat *er* yrki tykkara? Og teir søgdu við Pharaoh, Tænarar tygara *eru* hirðar, bæði vit, *og* eisini fedrar várir.

4 Teir søgdu haraftrat við Pharaoh, Til at útisita í landinum eru vit komnir; tí at tænarar tygara hava einkið beiti til fylgja sína; tí at hungursneyðin *er* svár í landi Cānaans: nú tessvegna, vit biðja tygum, latið tænarar tygara búgva í landi Gō´-sjěn-s.

5 Og Pharaoh talaði við Jóseph, sigandi, Faðir tín og brøður tínir eru komnir til tín:

6 Egyptaland *er* frammanfyri tær; í tí besta av landinum fá faðir tín og brøður tínar at dvøljast; í landi Gō´-sjěn-s lat teir dvøljast: og um tú veitst *um nakrar* avreksmenn teirra millum, tá ger teir *til* stjórnarar yvir fenaði mínum.

7 Og Jóseph førdi inn Jákob, faðir sín, og setti hann frammi fyri Pharaoh: og Jákob vælsignaði Pharaoh.

8 Og Pharaoh segði við Jákob, Hvussu gamal *eru* tygum?

9 Og Jákob segði við Pharaoh, Dagarnir av árunum av míni pílagrímsferð *eru* eitt hundrað og tríati ár: fáir og óndir hava dagarnir av árunum av mínum lívi verið, og hava ikki nátt at døgunum av árunum av lívi fedra mína í døgunum av teirra útlegdarferð.

10 Og Jákob vælsignaði Pharaoh, og fór út frá frammi fyri Pharaoh.

11 ¶ Og Jóseph staðsetti faðir sín og brøður sínar, og gav teimum eina ogn í Egyptalandi, í tí besta av landinum, í landi Răm´-ĕ-sēs-ar, eins og Pharaoh hevði boðið.

12 Og Jóseph uppihelt faðir sín, og brøður sínar, og alt húshald faðirs síns, við breyði, samsvarandi við familjur *teirra*.

13 ¶ Og *tað var* einkið breyð í øllum landinum; tí hungursneyðin *var* sera svár, so at Egyptaland og *alt* land Cānaans ørmaktaðust uppá grund av hungursneyðini.

14 Og Jóseph savnaði upp allan peningin sum fanst í Egyptalandi, og í landi Cānaans, fyri kornið ið teir keyptu: og Jóseph kom við peninginum inn í hús Pharaohs.

15 Og tá ið peningur svitaðist í Egyptalandi, og í landi Cānaans, komu allir Egyptarnir til Jósephs, og søgdu, Gev okkum breyð: tí at hví skuldu vit doyð í nærveru tíni? Tí at peningurin svitast.

16 Og Jóseph segði, Gevið tykkara fenað; og eg vil geva tykkum fyri tykkara fenað, um peningur svitist.

17 Og teir førdu fenað sín til Jósephs: og Jóseph gav teimum breyð *í býti* fyri hestar, og fyri smáfæafylgini, og fyri fenaðin av stórfæafylgjunum, og fyri asnarnar: og hann føddi teir við breyði fyri allan teirra fenað í tí árinum.

18 Tá ið tað árið var endað, komu teir at honum hitt annað árið, og søgdu við hann, Vit vilja ikki fjala *tað* fyri harra mínum, hvussu ið okkara peningur er brúktur; mín harri eisini hevur okkara stórdýrafylgir av fenaði; tað er ikki nakað eftir í eygsjón harra míns, uttan okkara kroppar, og okkara jarðir:

19 Hvørsvegna skulu vit doyggja frammi fyri eygum tínum, bæði vit og land okkara? keyp okkum og land okkara fyri breyð, og vit og land okkara vilja vera tænarar hjá Pharaoh: og gev *okkum* sáð, at vit mega liva, og ikki doyggja, at landið verði ikki oyði.

20 Og Jóseph keypti alla jørð Egyptalands til Pharaohs; tí at Egyptarnir seldu hvør maður akur sín, av tí at hungursneyðin hevði yvirvág yvir teimum: so landið gjørdist Pharaohs.

21 Og hvat fólkinum viðvíkur, hann burtflutti tey til staðir frá *ēinum* enda av landamørkum Egyptalands enntá at *hīnum* endanum hará.

22 Einans landið hjá prestunum keypti hann ikki; tí at prestarnir høvdu ein skamt *ásettan sær* av Pharaoh, og ótu skamt sín sum Pharaoh gav teimum: hvørsvegna teir seldu ikki jarðir sínar.

23 Tá segði Jóseph við fólkið, Sí, eg havi keypt tykkum henda dag og tykkara jørð til Pharaohs: sí, *her er* sáð til tykkara, og tit skulu sáa jørðina.

24 Og tað skal bera á í grøðini, at tit skulu geva fimta*partin* innat Pharaoh, og fýra partar skulu vera tykkar egnu, til sáð akursins, og til matnað tykkara, og til teirra av húskjum tykkara, og til matnað til hini smáu tykkara.

25 Og teir søgdu, Tú hevurt frelst livini hjá okkum: lat okkum finna náði í eygsjón harra míns, og vit vilja vera tænarar Pharaohs.

26 Og Jóseph gjørdi tað til eina lóg yvir Egyptalandi at hesum degi, *at* Pharaoh skuldi hava fimta*partin;* undantikið landið hjá prestunum einans, *sum* gjørdist ikki Pharaohs.

27 ¶ Og Ísrael dvaldist í Egyptalandi, í landi Gō´-sjĕn-s, og teir høvdu ognir harí, og vuksu, og margfaldaðust ovurhondsliga.

28 Og Jákob livdi í Egyptalandi seytjan ár: so allur aldurin hjá Jákobi var eitt hundrað *og* fjøruti og sjey ár.

29 Og tíðin nærkaðist at Ísrael mátti doyggja: og hann kallaði son sín Jóseph, og segði við hann, Um nú eg havi funnið náði í eygsjón tíni, legg, eg biði teg, tína hond undir lend mína, og far blídligani og sannligani við mær; jarða meg ikki, eg biði teg, í Egyptalandi:

30 Men eg vil liggja hjá fedrum mínum, og tú skalt bera meg út úr Egyptalandi, og jarða meg í teirra jarðingarplássi. Og hann segði, Eg vil gera sum tú hevurt sagt.

31 Og hann segði, Svør mær. Og hann svór honum. Og Ísrael boygdi seg uppá seingjarstokkin.

KAPITUL 48

OG tað bar á eftir hesi tingini, at *ēin* segði Jósephi frá, Sí, faðir tín *er* sjúkur: og hann tók við sær synir sínar tvá, Mă-năs´-sĕh og Ē´-phră-ĭm.

2 Og *ēin* taldi Jákobi, og segði, Sí, sonur tín Joseph kemur til tín: og Ísrael styrkti seg, og settist uppá seingina.

3 Og Jákob segði við Joseph, Guð Almáttugi birtist mær í Lûz í landi Cānaans, og vælsignaði meg,

4 Og segði við meg, Sí, eg vil gera teg ávakstamiklan, og margfalda teg, og eg vil gera úr tær eina fjøld av fólki; og vil geva hetta landið til sáð títt eftir teg *til* eina ævigtvarandi ogn.

5 ¶ Og nú, synir tínir tveir, Ē´-phră-ĭm og Mă-năs´-sĕh, sum vórðu føddir tær í Egyptalandi, áðrenn eg kom til tín inn í Egyptaland, *eru* mínir; eins og Reûben og Símeon, skulu teir vera mínir.

6 Og títt avkom, sum tú gitirt eftir teir, skal vera títt, *og* skal verða kallað eftir navni brøðra teirra í arvi sínum.

7 Og hvat mær viðvíkur, tá ið eg kom frá Pá´-dăn, doyði Rachel við mína *lið* í landi Cānaans á veginum, tá ið *tað var* enn bert ein stuttur vegur at koma til Ē´-phrăth: og eg jarðaði hana har á vegi Ē´-phrăth-s; tað sama *er* Beth-lehem.

8 Og Ísrael sá synirnar hjá Jósephi, og segði, Hvørjir *eru* hesir?

9 Og Joseph segði við faðir sín, Teir *eru* synir mínir, hvørjar Guð hevur givið mær á hesum *staði*. Og hann segði, Før teir, eg biði teg, til mín, og eg vil vælsigna teir.

10 Nú, eyguni hjá Ísrael vóru dimm vegna aldurs, *so at* hann ei kundi sjá. Og hann førdi teir nær at honum; og hann kysti teir, og fevndi teir.

11 Og Ísrael segði við Joseph, Eg hevði ikki hugsað at síggja andlit títt: og sí, Guð hevur sýnt mær eisini sáð títt.

12 Og Joseph førdi teir út frá ímillum hansara knø, og boygdi seg við andliti sínum til jarðarinnar.

13 Og Joseph tók teir báðar, Ē´-phră-ĭm í sína høgru hond ímóti Ísraels vinstru hond, og Mă-năs´-sĕh í sína vinstru hond ímóti Ísraels høgru hond, og førdi *teir* nær at honum.

14 Og Ísrael rætti út sína høgru hond, og legði *hana* uppá høvur Ē´-phră-ĭm-s, sum *var* hin yngri, og sína vinstru hond uppá høvur Mă-năs´-sĕh, leiðbeinandi hendur sínar viljugliga; tí at Mă-năs´-sĕh *var* hin frumborni.

15 ¶ Og hann vælsignaði Joseph, og segði, Guð, frammi fyri hvørjum fedrar mínir, Ábraham og Ísaak*ur,* gingu, tann Guð, sum føddi meg alt mítt líðilanga lív at hesum degi,

16 Tann Eingil, sum endurloysti meg frá øllum illum, vælsigni piltarnar; og lat mítt navn verða nevnt á teimum, og navn fedra mína, Ábrahams og Ísaaks; og lat teir vaksa í eina fjøld á miðjari jørðini.

17 Og tá ið Joseph sá, at faðir hansara legði sína høgru hond uppá høvur Ē´-phră-ĭm-s, mistoknaði tað honum: og hann helt uppi hond faðirs síns, til at flyta hana burtur frá høvdi Ē´-phră-ĭm-s til høvur Mă-năs´-sĕh.

18 Og Jóseph segði við faðir sín, Ikki so, faðir mín: tí at hesin *er* hin frumborni; set tína høgru hond uppá høvur hansara.

19 Og faðir hansara sýtti, og segði, Eg veit *tað,* sonur mín, eg veit *tað:* hann eisini skal gerast eitt fólk, og hann eisini skal verða mikil: men sanniliga, hansara yngri bróðir skal verða miklari enn hann, og hansara sáð skal gerast ein fjøld av tjóðum.

20 Og hann vælsignaði teir tann dagin, sigandi, Í tær skal Ísrael vælsigna, sigandi, Guð geri teg sum Ē´-phră-ĭm og sum Mă-năs´-sĕh: og hann setti Ē´-phră-ĭm framum Mă-năs´-sĕh.

21 Og Ísrael segði við Jóseph, Sí, eg doyggi: men Guð skal vera við tykkum, og føra tykkum aftur at landi fedra tykkara.

22 Harafturat havi eg givið til tín ēin skamt uppum brøður tínar, sum eg tók út úr hondini á Amoritanum við svørði mínum og við boga mínum.

KAPITUL 49

OG Jákob kallaði á synir sínar, og segði, Savnið tykkum saman, at eg má siga tykkum *tað* sum skal viðurfara tykkum í hinum síðstu døgum.

2 Savnið tykkum saman, og hoyrið, tit synir Jákobs; og lýðið á Ísrael, faðir tykkara.

3 ¶ Reûben, tú *ert* mín frumborni, mín máttur, og byrjanin av míni styrki, avbærnin av tign, og avbærnin av kraft:

4 Óstøðugur sum vatn, skalt tú ikki skara framúr; tí at tú fórt upp í song faðirs tíns; tá dálkaðirt tú *hana:* hann fór upp til legu mína.

5 ¶ Símeon og Levī *eru* brøður; grimdar-amboð *eru í* teirra býlum.

6 O mín sál, kom ikki tú inn í teirra loyndarmál; at teirra savnaði, æra mín, ver ikki tú sameind: tí at í síni firtni vógu teir ein mann, og í sínum sjálvsvilja gróvu teir niður ein múr.

7 Bannað *veri* teirra firtni, tí at *hon var* øgilig; og teirra vreiði, tí at hon var grimm: eg vil deila teir í Jákobi, og spjaða teir í Ísrael.

8 ¶ Judah, tú *ert hann,* hvørjum brøður tínir skulu prísa: tín hond *skal vera* á hálsinum á tínum figgindum; faðirs tíns børn skulu boyggja *seg* niður frammi fyri tær.

9 Judah *er* ein leyvuhvølpur: frá ráninum, sonur mín, ert tú farin upp: hann heyk niður, hann slangaði *sær* sum ein leyva, og sum ein gomul leyva; hvør skal rumska hann upp?

10 Veldissprotin skal ikki víkja frá Judah, ella ein lóggevari frá ímillum hansara føtur, inntil Sjí´-lôh komi; og innat honum *skal* savnan fólksins *verða.*

11 Bindandi sín fola at víntræinum, og sítt asnarfyl at úrvals víntræinum; tvó hann síni pløgg í víni, og síni klæðir í vínberjablóðinum:

12 Hans eygu *skulu vera* reyð við víni, og hansara tenn hvítar við mjólk.

13 ¶ Zē´-bū-lŏn skal búgva við havn havsins; og hann *skal vera* til eina havn hjá skipum; og hansara mark *skal vera* at Zī´-dŏn.

14 ¶ Ĭs´-să-chăr *er* ein sterkur asni, leggjandi *seg* niður ímillum tvær byrðar:

15 Og hann sá, at hvíld *var* góð, og landið, at *tað var* dámligt; og boygdi sína øksl til at bera, og gjørdist ein tænari at íkasti.

16 ¶ Dán skal døma hans fólk, sum ēin av Ísraels ættargreinum.

17 Dán skal vera ein høggormur við vegin, ein eiturormur á gøtuni, sum bítur hest-hælirnar, so at reiðmaður hansara skal falla aftureftir.

18 Eg havi bíðað eftir frelsu tíni, O HARRI.

19 ¶ Gád, eitt *hermanna*lið skal vinna á honum: men hann skal sigra til síðst.
20 ¶ Út úr Ásjer *skal* hansara breyð *vera* feitt, og hann skal veita kongligar krásir.
21 ¶ Năph´-tâ-lī *er* ein hind latin leys: hann gevur føgur orð.
22 ¶ Jóseph *er* ein fruktagóður bulur, *enntá* ein fruktagóður bulur við eina keldu; *hvørs* greinar renna yvirum múrin:
23 Bogamenninir hava svárliga harmað hann, og skotið *eftir honum,* og hatað hann:
24 Men hansara bogi varð *verandi* í styrki, og leggirnir av hansara hondum vórðu gjørdir sterkir av hondum hins mektiga *Guðs* Jákobs; (haðani frá *er* hirðin, Ísraels steinur:)
25 *Enntá* av Guði faðirs tíns, sum skal hjálpa tær; og við hinum Almáttuga, sum skal vælsigna teg við signingum úr himni fyri oman, signingum úr djúpinum sum liggur undir, signingum bróstanna, og móðurlívsins:
26 Signingar faðirs tíns hava havt yvirvág uppum signingar forfedra mína at ytsta marki hinna ævigtvarandi heyggja: tær skulu vera á høvdi Josephs, og á krúnuni á høvdi hansara sum var atskildur frá brøðrum sínum.
27 ¶ Benjamin skal ránskast *sum* ein úlvur: um morgunin skal hann slúka bráðina, og um aftan skal hann deila herfongin.
28 ¶ Allir hesir *eru* hinar tólv ættargreinir Ísraels: og hetta *er tað* sum teirra faðir talaði teimum, og vælsignaði teir; hvønn *og* ein samsvarandi við hansara signing vælsignaði hann teir.
29 Og hann álegði teimum, og segði við teir, Eg eigi at verða savnaður at fólki mínum: jarðið meg hjá fedrum mínum í hellinum sum *er* í akri Ē´-phrŏn-s Hittita,
30 Í hellinum sum *er* í Măch-pē´-lâh akrinum, sum *er* frammanfyri Măm´-rê, í landi Cānaans, sum Ábraham keypti við akri Ē´-phrŏn-s Hittita til eina ogn av einum jarðingarplássi.
31 Har jarðaðu teir Ábraham og Sáruh, konu hansara; har jarðaðu teir Ísaak og Rebēkuh, konu hansara; og har jarðaði eg Leuh.
32 Keypið av akrinum og av hellinum, sum *er* harí, *var* frá Heths børnum.
33 Og tá ið Jákob hevði lokið við at skipa sonum sínum, savnaði hann upp sínar føtur inn í seingina, og gav upp andan, og varð savnaður at fólki sínum.

KAPITUL 50

OG Jóseph fell uppá andlit faðirs síns, og grætt uppiá honum, og kysti hann.
2 Og Jóseph skipaði tænarum sínum, læknunum, at balsamera faðir sín: og læknarnir balsameraðu Ísrael.
3 Og fjøruti dagar vórðu uppfyltir fyri hann; tí at soleiðis verða uppfyltir dagarnir hjá teimum ið verða balsameraðir: og Egyptarnir harmaðu yvir hann *í* trísinstjúgu og tíggju dagar.
4 Og tá ið dagarnir av hansara harming vóru umlidnir, talaði Joseph við Pharaohs hús, sigandi, Um nú eg havi funnið náði í eygum tykkara, talið, eg biði tykkum, í oyru Pharaohs, sigandi,
5 Mín faðir fekk meg *at* svørja, sigandi, Sí, eg doyggi: í míni grøv sum eg havi grivið til mín í landi Cānaans, har skalt tú jarða meg. Nú tessvegna, lat meg fara upp, eg biði teg, og jarða faðir mín, og eg vil koma aftur.
6 Og Pharaoh segði, Far upp, og jarða faðir tín, samsvarandi sum hann fekk teg *at* svørja.

7 ¶ Og Jóseph fór upp at jarða faðir sín: og við honum fóru upp allir tænarar Pharaohs, hinir elstu av húsi hans, og allir hinir elstu Egyptalands,
8 Og alt hús Jósephs, og hansara brøður, og hansara faðirs hús: einans hini smáu teirra, og teirra smáfæafylgir, og teirra stórfæafylgir, eftirlótu teir í landi Gō´-sjěn-s.
9 Og tað fóru upp við honum bæði vagnar og reiðmenn: og tað var ein sera stórur flokkur.
10 Og teir komu til treskigólv Á´-tăd-s, sum *er* handan Jordan, og har harmaðu teir við einum miklum og sera svárum harmljóði: og hann gjørdi eina harman yvir faðir sín sjey dagar.
11 Og tá ið íbúgvar landsins, Cānaanitarnir, sóu harmingina á gólvi Á´-tăd-s, søgdu teir, Hetta *er* ein svárlig harman fyri Egyptunum: hvørsvegna navnið á tí varð kallað Á´-bĕl-mīz´-râ-īm, sum *er* handan Jordan.
12 Og hansara synir gjørdu honum samsvarandi sum hann skipaði teimum:
13 Tí at synir hansara bóru hann inn í land Cānaans, og jarðaðu hann í helli Măch-pĕ´-lâh akurs, sum Ábraham keypti við akrinum til eina ogn av einum jarðingarplássi av Ē´-phrŏn-i Hittita, frammanfyri Măm´-rê.
14 ¶ Og Jóseph vendi aftur inn í Egyptaland, hann, og brøður hansara, og allir sum fóru upp við honum at jarða faðir hansara, eftir *at* hann hevði jarðað faðir sín.
15 ¶ Og tá ið Jósephs brøður sóu, at teirra faðir var deyður, søgdu teir, Jóseph vil møguligvís hata okkum, og vil vissuliga endurgjalda okkum alt tað illa sum vit gjørdu honum.
16 Og teir sendu eitt sendiboð at Jóseph, sigandi, Tín faðir bjóðaði áðrenn hann doyði, sigandi,
17 Soleiðis skulu tit siga við Jóseph, Fyrigev, eg biði teg nú, misgerðina hjá brøðrum tínum, og teirra synd; tí at teir gjørdu tær ilt: og nú, vit biðja teg, fyrigev misgerðina hjá tænarum Guðs faðirs tíns. Og Jóseph græt, tá ið teir talaðu við hann.
18 Og hansara brøður eisini fóru og fullu niður frammi fyri andliti hansara; og teir søgdu, Sí, vit *veri* tænarar tínir.
19 Og Jóseph segði við teir, Óttist ikki: tí at *eri* eg í plássi Guðs?
20 Og hvat tykkum varðar, tit hugsaðu ilt ímóti mær; *men* Guð ætlaði tað at góðum, til at føra til at bera á, sum *tað er* henda dag, til *tess* at frelsa nógv fólk á lívi.
21 Nú tessvegna, óttist tit ikki: eg vil uppihalda tykkum, og hini smáu tykkara. Og hann uggaði teir, og talaði blídligani við teir.
22 ¶ Og Jóseph dvaldist í Egyptalandi, hann, og hansara faðirs hús: og Jóseph livdi eitt hundrað og tíggju ár.
23 Og Jóseph sá børn Ē´-phrăim-s hins triðja *ættarliðs:* børnini eisini hjá Má´-chīr, syni Mă-năs´-sĕh, vórðu førd upp uppá Jóseph knø.
24 Og Jóseph segði við brøður sínar, Eg doyggi: og Guð vil vissuliga vitja tykkum, og føra tykkum út úr hesum landi at landinum sum hann svór til Ábrahams, til Ísaaks, og til Jákobs.
25 Og Jóseph tók ein eið av Ísraels børnum, sigandi, Guð vil vissuliga vitja tykkum, og tit skulu bera upp míni bein hiðani frá.
26 So Jóseph doyði, *verandi* eitt hundrað og tíggju ára gamalur: og teir balsameraðu hann, og hann varð settur í eina kistu í Egyptalandi.

HIN ONNUR BÓK MÓSESAR, KALLAÐ EXODUS.

KAPITUL 1

NÚ, hesi *eru* nøvn Ísraels barna, sum komu inn í Egyptaland; hvør maður og húshald hansara komu við Jákobi.
2 Reūben, Símeon, Levī, og Judah,
3 Ìs´-să-chār, Zē´-bŭ-lŏn, og Benjamin,
4 Dán, og Năph´-tâ-lī, Gád, og Ásjer.
5 Og allar sálirnar, sum komu út úr lendum Jákobs, vóru sjeyti sálir: tí at Józeph var í Egyptalandi *longu*.
6 Og Józeph doyði, og allir bræður hansara, og øll tann ættin.
7 ¶ Og Ísraels børn vóru ávakstamikil, og tóku til ovurhondsligani, og margfaldaðust, og vuksu avbera mektigir; og landið varð fylt við teimum.
8 Nú, tað reistist upp ein nýggjur kongur yvir Egyptalandi, sum kendi ikki Józeph.
9 Og hann segði við fólk sítt, Sí, fólk Ísraels barna *eru* fleiri og mektigari enn vit:
10 Komið nú, latum okkum fara vísligani við teimum; at ikki teir margfaldist, og tað beri á, at tá ið tað falli út nakað kríggj, teir sameinist eisini at okkara fíggindum, og kríggi ímóti okkum, og *soleiðis* komi sær upp út úr landinum.
11 Tí settu teir yvir teimum verkmeistarar til at níva teir við byrðum sínum. Og teir bygdu fyri Pharaoh goymslustaðir, Pī´-thōm og Râ-ăm´-sês.
12 Men tess meira teir nívdu teir, tess meira margfaldaðust teir og vuksu. Og teir vórðu harmir uppá grund av Ísraels børnum.
13 Og Egyptarnir fingu Ísraels børn at tæna við harðrendni:
14 Og teir gjørdu lívini hjá teimum beisk við hørðum træl-dómi, í mørtli, og í múrsteini, og í alskyns tænastu í akrinum: øll teirra tænasta, í hvørji teir fingu teir at tæna, *var* við harðrendni.
15 ¶ Og kongur Egyptalands talaði til Hebrāisku ljósmøðurnar, av hvørjum navnið hjá tí ēinu *var* Sjīph´-răh, og navnið hjá hīnari var Pū´-ăh:
16 Og hann segði, Tá ið tit gera embætið hjá eini ljósmóður við hinar Hebrāisku kvinnurnar, og síggja *tær* uppiá stólunum; um tað *veri* ein sonur, so skulu tit drepa hann: men um tað *veri* ein dóttir, so skal hon liva.
17 Men ljósmøðurnar óttaðust Guð, og gjørdu ikki sum kongur Egyptalands skipaði teimum, men bjargaðu sveinsbørnunum á lívi.
18 Og kongur Egyptalands kallaði á ljósmøðurnar, og segði við tær, Hví hava tit gjørt henda lut, og hava bjargað sveinsbørnunum á lívi?
19 Og ljósmøðurnar søgdu við Pharaoh, Av tí at tær Hebrāisku kvinnurnar *eru* ikki sum tær Egyptisku kvinnurnar; tí at tær *eru* lívligar, og eru útfríaðar áður enn ljósmøðurnar koma inn til teirra.
20 Tessvegna fór Guð væl við ljósmøðrunum: og fólkið margfaldaðist, og vaks sera mektugt.
21 Og tað bar á, av tí at ljósmøðurnar óttaðust Guð, at hann gjørdi teimum hús˘.
22 Og Pharaoh álegði øllum fólki sínum, sigandi, Hvønn son, sum verður føddur, skulu tit kasta inn í ánna, og hvørja dóttur skulu tit bjarga á lívi.

KAPITUL 2

OG tað fór ein maður av húsi Levīs, og tók *til konu* eina dóttur Levīs.

2 Og kvinnan ól fram, og føddi ein son: og tá ið hon sá hann, at hann *var eitt* frálíkt *barn,* fjaldi hon hann tríggjar mánaðir.

3 Og tá ið hon kundi ikki longur fjala hann, tók hon til hansara eina ørk av sevstavum, og bræddi hana við jarðlími og við biki, og koyrdi barnið harí; og hon legði *tað* í størini við áarbakkan.

4 Og systir hansara stóð langt burturifrá, at vita hvat fór at verða gjørt við hann.

5 ¶ Og dóttir Pharaohs kom oman at tváa *sær* við ánna; og hennara moyggjar gingu frameftir við áarbakkan; og tá ið hon sá ørkina millum størini, sendi hon ternu sína at heinta hana.

6 Og tá ið hon hevði opnað *hana,* sá hon barnið: og sí, pinkubarnið grætt. Og hon hevði várkunn yvir hann, og segði, Hetta *er ēitt* av børnunum hjá Hebrēarunum.

7 Tá segði systir hansara til dóttur Pharaohs, Skal eg fara og kalla til tín eina daddu av Hebrāisku kvinnunum, at hon má dadda barnið fyri teg?

8 Og dóttir Pharaohs segði til hennara, Far. Og moyggin fór og kallaði móður barnsins.

9 Og dóttir Pharaohs segði við hana, Tak hetta barnið burtur, og dadda tað fyri meg, og eg vil geva *tær* løn tína. Og kvinnan tók barnið, og daddaði tað.

10 Og barnið vaks, og hon førdi hann at dóttur Pharaohs, og hann gjørdist sonur hennara. Og hon kallaði navn hansara Móses: og hon segði, Av tí at eg dró hann út úr vatninum.

11 ¶ Og tað bar á í teimum døgum, tá ið Móses var vaksin, at hann fór út at brøðrum sínum, og hugdi á teirra byrðar: og hann bar eyga við ein Egypta, sláandi ein Hebrēara, ēin av brøðrum sínum.

12 Og hann hugdi henda veg og handa veg, og tá ið hann sá at *har var* eingin maður, vá hann Egyptan, og fjaldi hann í sandinum.

13 Og tá ið hann fór út annan dagin, sí, tveir menn av Hebrēarunum klandraðust saman: og hann segði til hansara sum gjørdi órættin, Hvørsvegna slært tú felaga tín?

14 Og hann segði, Hvør gjørdi teg *til* ein prins og ein dómara yvir okkum? ætlart tú at drepa meg, eins og tú drapst Egyptan? Og Móses óttaðist, og segði, Vissuliga, hesin lutur er kunnur.

15 Nú, tá ið Pharaoh hoyrdi henda lut, søkti hann at vega Móses. Men Móses flýddi frá andliti Pharaohs, og dvaldist í landi Mī′-dī-ăn-s: og hann settist niður við ein brunn.

16 Nú, prestur Mī′-dī-ăn-s hevði sjey døtur: og tær komu og drógu *vatn,* og fyltu trogini til at vatna fylgi faðirs síns.

17 Og hirðarnir komu og róku tær burtur: men Móses stóð upp og hjálpti teimum, og vatnaði fylgi teirra.

18 Og tá ið tær komu til Rĕŭ′-ĕl-s, faðirs síns, segði hann, Hvussu *er tað, at* tit eru komnar so skjótt í dag?

19 Og tær søgdu, Ein Egypti bjargaði okkum út úr hond hirðanna, og eisini dró *vatn* nokk til okkara, og vatnaði fylgið.

20 Og hann segði við døtur sínar, Og hvar *er* hann? hví *er* tað, *at* tit hava eftirlatið mannin? kallið hann, at hann má eta breyð.

21 Og Móses var nøgdur *við* at búgva hjá manninum: og hann gav Mósesi Zĭp-pō′-rŭh, dóttur sína.

22 Og hon bar *honum* son, og hann kallaði navn hansara Gĕr´-sjŏm: tí at hann segði, Eg havi verið ein fremmandur í einum fremmandum landi.

23 ¶ Og tað bar á í framlíðing tíðar*innar,* at kongur Egyptalands doyði: og børn Ísraels suffaðu uppá grund av trældóminum, og tey rópaðu, og teirra róp kom upp at Guði uppá grund av trældóminum.

24 Og Guð hoyrdi teirra eymkan, og Guð mintist til sín sáttmála við Ábraham, við Ísaak, og við Jákob.

25 Og Guð hugdi uppá børn Ísraels, og Guð hevði fyrilit yvirfyri *teimum*.

KAPITUL 3

NÚ, Móses passaði fylgið hjá Jĕth´-rô, verfaðir sínum, presti Mĭ´-dī-ăn-s: og hann leiddi fylgið til baksíðuna av oyðimørkini, og kom til fjalls Guðs, *enntá* til Hór´-ĕb.

2 Og eingil HARRANS birtist honum í einum loga av eldi út úr miðjuni av einum runni: og hann hugdi, og sí, runnurin brendi við eldi, og runnurin *varð* ikki upptærdur.

3 Og Móses segði, Eg vil nú venda til viks, og síggja hesa miklu sjón, hví runnurin verður ikki brendur.

4 Og tá ið HARRIN sá, at hann vendi til viks at sjá, kallaði Guð á hann út úr miðjum runninum, og segði, Móses, Móses. Og hann segði, Her *eri* eg.

5 Og hann segði, Dregst ikki nær higar: tak av tínar skógvar uttan av fótum tínum, tí at staðið, hvará tú stendurt, *er* heilag jørð.

6 Haraftrat segði hann, Eg *eri* Guð faðirs tíns, Guð Ábrahams, Guð Ísaaks, og Guð Jákobs. Og Móses fjaldi andlit sítt; tí at hann var ræddur at hyggja uppá Guð.

7 ¶ Og HARRIN segði, Eg havi vissuliga sæð nívdina hjá mínum fólki sum *eru* í Egyptalandi, og havi hoyrt teirra róp uppá grund av teirra verkmeistarum; tí at eg veit teirra sorgir;

8 Og eg eri komin niður til at útfría teir út úr hond Egyptanna, og til at føra teir upp út úr hasum landinum at einum góðum landi og einum stórum, at einum landi floymandi við mjólk og hunangi; at plássi Cānaanitanna, og Hittitanna, og Amoritanna, og Pê-rĭz-zĭt´-anna, og Hî-vĭt´-anna, og Jĕbŭ-sĭt´-anna.

9 Nú tessvegna, sí, róp Ísraels barna er komið at mær: og eg havi eisini sæð kúganina, hvarvið Egyptarnir kúga teir.

10 Kom nú tessvegna, og eg vil senda teg at Pharaoh, at tú mást føra fram fólk mítt, børn Ísraels, út úr Egyptalandi.

11 ¶ Og Móses segði við Guð, Hvør *eri* eg, at eg skuldi farið til Pharaohs, og at eg skuldi ført fram Ísraels børn út úr Egyptalandi?

12 Og hann segði, Vissuliga, eg vil vera við tær; og hetta *skal vera* tær tekin, at eg havi sent teg: Tá ið tú hevurt ført fram fólkið út úr Egyptalandi, skulu tit tæna Guði uppiá hesum fjallinum.

13 Og Móses segði við Guð, Sí, *tá ið* eg komi at Ísraels børnum, og skal siga við teir, Guð fedra tykkara hevur sent meg at tykkum; og teir skulu siga til mín, Hvat *er* navn hansara? hvat skal eg siga við teir?

14 Og Guð segði við Móses, EG ERI TAÐ EG ERI: og hann segði, Svá skalt tú siga við børn Ísraels, EG ERI hevur sent meg at tykkum.

15 Og Guð segði haraftrat við Móses, Svá skalt tú siga við børn Ísraels, HARRIN Guð fedra tykkara, Guð Ábrahams, Guð Ísaaks,

og Guð Jákobs, hevur sent meg at tykkum: hetta *er* navn mítt um ævir, og hetta *er* mítt minni at øllum ættum.

16 Far, og savna hinar elstu av Ísrael saman, og sig við teir, HARRIN Guð fedra tykkara, Guð Ábrahams, Ísaaks, og Jákobs, birtist at mær, sigandi, Eg havi vissuliga vitjað tykkum, og *sæð* tað sum verður gjørt við tykkum í Egyptalandi:

17 Og eg havi sagt, Eg vil føra tykkum upp út úr nívd Egyptalands at landi Cānaanitanna, og Hittitanna, og Amoritanna, og Pê-rīz-zīt´-anna, og Hī-vīt´-anna, og Jēb-ū-sīt´-anna, at einum landi floymandi við mjólk og hunangi.

18 Og teir skulu geva gætur at rødd tíni: og tú skalt koma, tú og teir elstu av Ísrael, at kongi Egyptalands, og tit skulu siga við hann, HARRIN Guð Hebrēanna hevur møtst við okkum: og nú, lat okkum fara, vit bøna teg, tríggja daga ferð inn í oyðuna, at vit mega sláturofra til HARRANS Guðs várs.

19 ¶ Og eg eri vísur í, at kongur Egyptalands vil ikki lata tykkum fara, nei, ikki viðˆ eini mektigari hond.

20 Og eg vil strekkja út hond mína, og sláa Egyptaland við øllum mínum undrum, sum eg vil gera í miðju tess: og eftir tað vil hann lata tykkum fara.

21 Og eg vil geva hesum fólki góðvild í eygsjón Egyptanna: og tað skal bera á, at tá ið tit fara, skulu tit ikki fara tóm*hent*ir:

22 Men hvør kvinna skal læna frá granna sínum, og frá henni sum útisitur í húsi hennara, smúkkur av silvuri, og smúkkur av gulli, og klædnað: og tit skulu koyra *tey* uppá synir tykkara, og uppá døtur tykkara; og tit skulu ræna Egyptarnar.

KAPITUL 4

OG Móses svaraði og segði, Men sí, teir vilja ikki trúgva mær, ella geva gætur at rødd míni: tí at teir vilja siga, HARRIN hevur ikki birtst at tær.

2 Og HARRIN segði við hann, Hvat *er* hatta í hond tíni? Og hann segði, Ein stavur.

3 Og hann segði, Kasta hann á jørðina. Og hann kastaði hann á jørðina, og hann gjørdist ein høggormur; og Móses flýddi frammi fyri honum ífrá.

4 Og HARRIN segði við Móses, Koyr fram hond tína, og tak hann eftir halanum. Og hann koyrdi fram hond sína, og greip hann, og hann gjørdist ein stavur í hond hansara:

5 At teir mega trúgva, at HARRIN Guð fedra teirra, Guð Ábrahams, Guð Ísaaks, og Guð Jákobs, hevur birtst at tær.

6 ¶ Og HARRIN segði ennvíðari við hann, Koyr nú hond tína inn í barm tín. Og hann koyrdi hond sína inn í barm sín: og tá ið hann tók hana út, sí, hansara hond *var* spitølsk sum snjó.

7 Og hann segði, Koyr hond tína inn í barm tín aftur. Og hann koyrdi hond sína inn í barm sín aftur; og sleit hana út úr barmi sínum, og sí, hon var umskift aftur eins og *hītt* kjøt hansara.

8 Og tað skal bera á, um teir vilji ikki trúgva tær, eiheldur geva gætur at røddini á tí fyrsta teknínum, at teir vilja trúgva røddini á tí seinna teknínum.

9 Og tað skal bera á, um teir vilji ikki trúgva eisini hesum tveimum teknunum, eiheldur geva gætur at rødd tíni, at tú skalt taka av vatninum úr ánni, og hella *tað* uppá tað turra *landið:* og vatnið, sum tú tekurt úr ánni, skal gerast blóð uppiá tí turra *landinum.*

10 ¶ Og Móses segði við HARRAN, O Harri mín, eg *eri* ikki væltalandi, hvørki herframmanundan, ella síðan tú hevurt talað við tænara tín: men eg *eri* seinur í talu, og av eini seinari tungu.

11 Og HARRIN segði við hann, Hvør hevur gjørt munn mans? ella hvør ger hin málleysa, ella deyva, ella hin síggjandi, ella hin blinda? havi ikki eg HARRIN?

12 Nú tessvegna, far, og eg vil vera við munni tínum, og læra teg hvat tú skalt siga.

13 Og hann segði, O Harri mín, send, eg biði teg, viðˇ hendi *hansara sum* tú vilt senda.

14 Og HARRANS firtni varð kynd ímóti Mósesi, og hann segði, *Er* ikki Aaron, Levitin, bróðir tín? Eg veit at hann dugir *at* tala væl. Og eisini, sí, hann kemur út at hitta teg: og tá ið hann sær teg, vil hann verða glaður í hjarta sínum.

15 Og tú skalt tala við hann, og leggja orðˇ í munn hansara: og eg vil vera við munni tínum, og við munni hansara, og vil læra tykkum hvat tit skulu gera.

16 Og hann skal vera talsmaður tín at fólkinum: og hann skal vera, *enntá* hann skal vera fyri tær ístaðin fyri ein munn, og tú skalt vera fyri honum ístaðin fyri Guð.

17 Og tú skalt taka henda stav í hond tína, hvarvið tú skalt gera tekinˇ.

18 ¶ Og Móses fór og vendi aftur til Jēthˊrō-s, verfaðirs síns, og segði við hann, Lat meg fara, eg biði teg, og venda aftur til bróðra mína sum *eru* í Egyptalandi, og sjá hvørt teir veri enn á lívi. Og Jēthˊrō segði við Móses, Far í friði.

19 Og HARRIN segði við Móses í Mīˊ-dī-ăn, Far, vend aftur inn í Egyptaland: tí at allir menninir eru deyðir, sum søktu lív títt.

20 Og Móses tók konu sína og synir sínar, og setti tey uppá ein asna, og hann vendi aftur til Egyptalands: og Móses tók stav Guðs í hond sína.

21 Og HARRIN segði við Móses, Tá ið tú fert til at venda aftur inn í Egyptaland, síggj til at tú geri øll hasi undrini frammi fyri Pharaoh, sum eg havi koyrt í hond tína: men eg vil herða hjarta hansara, at hann skal ikki lata fólkið fara.

22 Og tú skalt siga við Pharaoh, Svá sigur HARRIN, Ísrael *er* sonur mín, *enntá* mín frumborni:

23 Og eg sigi við teg, Lat son mín fara, at hann má tæna mær: og um tú sýti at lata hann fara, sí, eg vil bana syni tínum, *enntá* tínum fyrstafødda.

24 ¶ Og tað bar á eftir veginum í tilhaldinum, at HARRIN møtti honum, og søkti at drepa hann.

25 Tá tók Zĭp-pṓ-răh ein hvassan stein, og skar av forhúðina hjá syni hennara, og kastaði *hana* við føtur hansara, og segði, Vissuliga, ein blóðigur ektamaður *ert* tú fyri mær.

26 So hann læt hann fara: síðan segði hon, Ein blóðigur ektamaður *tú ert,* uppá grund av umskeringini.

27 ¶ Og HARRIN segði til Aarons, far inn í oyðuna at hitta Móses. Og hann fór, og hitti hann á fjalli Guðs, og kysti hann.

28 Og Móses segði Aaroni øll orðini hjá HARRANUM, sum hevði sent hann; og øll teknini, sum hann hevði boðið honum.

29 ¶ Og Móses og Aaron fóru og savnaðu saman allar teir elstu av Ísraels børnum:

30 Og Aaron talaði øll orðini, sum HARRIN hevði talað við Móses, og gjørdi teknini í eygsjónini á fólkinum.

31 Og fólkið trúði: og tá ið teir hoyrdu, at HARRIN hevði vitjað børn Ísraels, og at hann hevði hugt uppá teirra nívd, tá boygdu teir høvur síni og tilbóðu.

KAPITUL 5

OG síðan fóru Móses og Aaron inn, og taldu Pharaoh, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Lat fólk mítt fara, at teir mega halda eina høgtíð at mær í oyðuni.

2 Og Pharaoh segði, Hvør *er* HARRIN, at eg skuldi lýtt rødd hansara, at latið Ísrael farið? eg kenni ikki HARRAN, eiheldur vil eg lata Ísrael fara.

3 Og teir søgdu, Guð Hebrēaranna hevur møtst við okkum: lat okkum fara, vit biðja teg, tríggja daga ferð inn í oyðimørkina, og sláturofra HARRANUM Guði várum; at ikki hann falli uppá okkum við drepsótt, ella við svørðinum.

4 Og kongur Egyptalands segði við teir, Hvørsvegna, Móses og Aaron, forða tit fólkinum frá teirra arbeiðum? sleppið tykkum at tykkara byrðum.

5 Og Pharaoh segði, Sí, landsins fólk nú *eru* mangir, og tit fáa teir at hvíla frá teirra byrðum.

6 Og Pharaoh skipaði hin sama dagin verkmeistarum fólksins, og teirra yvirmonnum, sigandi,

7 Tit skulu ikki meira geva fólkinum strá til at gera múrstein, sum herframmanundan: latið teir fara og savna strá til sín sjálvs.

8 Og talið á múrsteinunum, sum teir herframmanundan gjørdu, skulu tit leggja uppá teir; tit skulu ikki minka *nakað* av tí: tí at teir *veri* yrkisleysir; tí rópa teir, sigandi, Latið okkum fara *og* sláturofra til Guðs várs.

9 Latið meira arbeiði verða lagt uppá menninar, at teir mega streva í tí; og latið teir ikki geva gætur *eftir* fáfongdum orðum.

10 ¶ Og verkmeistarar fólksins fóru út, og teirra yvirmenn, og teir talaðu til fólkið, sigandi, Svá sigur Pharaoh, Eg vil ikki geva tykkum strá.

11 Farið tit, fáið tykkum strá, har tit kunnu finna tað: tó skal ikki nakað av tykkara arbeiði verða minkað *um*.

12 So fólkini vórðu spjødd útumkring út gjøgnum alt Egyptaland, at savna hálm ístaðin fyri strá.

13 Og verkmeistararnir skundaðu *undir teir,* sigandi, Uppfyllið tykkara arbeiðir, *tykkara* dagligu setningar, sum tá ið strá var.

14 Og yvirmenninir hjá Ísraels børnum, sum Pharaohs verkmeistarar høvdu sett yvir teimum, vórðu bardir, *og* kravdir, Hvørsvegna hava tit ikki uppfylt tykkara setning í at gera múrstein bæði í gjár og í dag, sum herframmanundan?

15 ¶ Tá komu yvirmenninir hjá Ísraels børnum og róptu á Pharaoh, sigandi, Hvørsvegna fert tú soleiðis við tænarum tínum?

16 Tað er einkið strá givið tænarum tínum, og teir siga til okkara, Gerið múrstein: og sí, tínir tænarar *verða* bardir; men feilurin *er* í tínum egna fólki.

17 Men hann segði, Tit *eru* yrkisleysir, *tit eru* yrkisleysir: tí siga tit, Latið okkum fara *og* inna sláturofran til HARRANS.

18 Farið tí nú, *og* arbeiðið; tí at tað skal einkið strá verða givið tykkum, tó skulu tit veita talið á múrsteinum.

19 Og yvirmenninir hjá Ísraels børnum sóu, *at* teir *vóru* í *eini* óndari *støðu,* eftir *at* tað varð sagt, Tit skulu ikki minka *um nakað* frá tykkara múrsteinum av tykkara dagliga setningi.

20 ¶ Og teir møttu Mósesi og Aaroni, sum stóðu á veginum, sum teir komu fram frá Pharaoh:

21 Og teir søgdu við teir, HARRIN hyggi uppá tykkum, og dømi; av tí at tit hava fingið okkara anga at verða stiknaðan við í eygum Pharaohs, og í eygunum á

tænarum hansara, til at koyra eitt svørð í teirra hond til at bana okkum.

22 Og Móses vendi aftur at HARRANUM, og segði, Harri, hvørsvegna hevurt tú *so* illani farið við hesum fólkinum? hví *er* tað, *at* tú hevurt sent meg?

23 Tí at síðan eg kom til Pharaohs at tala í navni tínum, hevur hann gjørt ilt við hetta fólk; eiheldur hevurt tú útfríað fólk títt yvirhøvur.

KAPITUL 6

TÁ segði HARRIN við Móses, Nú skalt tú síggja hvat eg vil gera við Pharaoh: tí at við sterkari hond skal hann lata teir fara, og við sterkari hond skal hann reka teir út úr landi sínum.

2 Og Guð talaði við Móses, og segði við hann, Eg *eri* HARRIN:

3 Og eg birtist at Ábrahami, at Ísaaki, og at Jákobi, við *navninum* Guð Almáttugur, men við mínum navni JE-HÓ-VÁH varð eg ikki kendur fyri teimum.

4 Og eg havi eisini grundlagt mín sáttmála við teir, at geva teimum Cánaans land, landið av teirra útlegd, í hvørjum teir vóru fremmandir.

5 Og eg havi eisini hoyrt stynjan Ísraels barna, hvørjar Egyptarnir halda í trældómi; og eg havi minst til sáttmála mín.

6 Hvørsvegna sig við Ísraels børn, Eg *eri* HARRIN, og eg vil føra tykkum út undan byrðum Egyptanna, og eg vil redda tykkum úr teirra trældómi, og eg vil endurloysa tykkum við einum útstrektum armi, og við miklum dómum:

7 Og eg vil taka tykkum til mín til eitt fólk, og eg vil vera fyri tykkum ein Guð: og tit skulu vita at eg *eri* HARRIN Guð tykkara, sum førir tykkum út undan byrðum Egyptanna.

8 Og eg vil føra tykkum inn at landinum, viðvíkjandi hvørjum eg svór at geva tað til Ábrahams, til Ísaaks, og til Jákobs; og eg vil geva tað tykkum til ein arvalut: eg *eri* HARRIN.

9 ¶ Og Móses talaði soleiðis við børn Ísraels: men teir góvu ikki gætur at Mósesi fyri angist av anda, og fyri grimman trældóm.

10 Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

11 Far inn, tala innat Pharaoh kongi av Egyptalandi, at hann lati børn Ísraels fara út úr landi sínum.

12 Og Móses talaði frammi fyri HARRANUM, sigandi, Sí, Ísraels børn hava ikki givið gætur at mær; hvussu skal tá Pharaoh hoyra meg, sum *eri* av óumskornum vørrum?

13 Og HARRIN talaði við Móses og við Áaron, og gav teimum eina álegging at Ísraels børnum, og at Pharaoh kongi av Egyptalandi, at føra børn Ísraels út úr Egyptalandi.

14 ¶ Hesir *veri* høvdini hjá húsum fedra teirra: Synirnir hjá Reûbeni, Ísraels frumborna; Hánŏch, og Păl'lû, Hĕz'rŏn, og Cârmī: hetta *veri* familjurnar av Reûbeni.

15 Og synirnir hjá Símeoni; Jĕ'mû'ĕl, og Já'mĭn, og Ó'hăd, og Já'chĭn, og Zŏ'hâr; og Sjā'ŭl, sonurin hjá eini Cánaanitiskari kvinnu: hetta *eru* familjurnar av Símeoni.

16 ¶ Og hesi *eru* nøvnini hjá sonum Levīs samsvarandi við ættirnar hjá teimum; Gĕr'sjŏn, og Kŏ'hăth, og Mĕ-râr'ī: og árini av lívinum hjá Levī *vóru* eitt hundrað *og* tríati og sjey ár.

17 Synirnir hjá Gĕr'sjŏn; Lĭb'nī, og Sjĭm'ī, samsvarandi við teirra familjur.

18 Og synirnir hjá Kŏ'hăth; Amram, og Ĭz'hâr, og Hē'brŏn, og Ŭz'zĭ'ĕl: og árini av lívinum

hjá Kō′-hăth *vóru* eitt hundrað *og* tríati og trý ár.

19 Og synirnir hjá Mĕ-râr′-ī; Má′-hâ-lī og Mū′-sjī: hetta *eru* familjurnar av Levī samsvarandi við ættir teirra.

20 Og Amram tók sær Jŏch′-ĕ-bĕd, systur faðirs síns, til konu; og hon bar honum Aaron og Móses: og árini av lívinum hjá Amrami *vórðu* eitt hundrað og tríati og sjey ár.

21 ¶ Og synirnir hjá Ĭs′-hâr; Kōr′-ăh, og Nĕph′-ĕg, og Zĭch′-rī.

22 Og synir Ūz′-zĭ-ĕl-s; Mĭ′-sjâ-ĕl, og Ēl′-zā-phân, og Zĭth′-rī.

23 Og Aaron tók sær Ĕ-lĭ′-sjĕ-bū, dóttur Ăm-mĭn′-ă-dăb-s, systur hjá Ná-ăsj′-ŏn, til konu; og hon føddi honum Nádab, og Á′-bĭ-hû, Ĕl-ĕ-ā′-zâr, og Ĭth′-ă-mâr.

24 Og synirnir hjá Kŏr′-ăh; Ăs′-sĭr, og Ēl′-kā-năh, og Á′-bĭ-ă-săph: hetta *eru* familjurnar av Kôr-hĭt′-unum.

25 Og Ĕl-ĕ-ā′-zâr, sonur Aarons, tók sær *ēina* av døtrum Pū′-tĭ-ĕl-s til konu; og hon føddi honum Phĭ′-nĕ-hăs: hetta *eru* høvdini av fedrunum hjá Levitunum samsvarandi við teirra familjur.

26 Hesir *eru* tann Aaron og Móses, til hvørja HARRIN segði, Førið út Ísraels børn frá Egyptalandi samsvarandi við teirra herar.

27 Hesir *eru* teir, sum talaðu til Pharaohs kongs av Egyptalandi at føra út Ísraels børn frá Egyptalandi: hesir *eru* tann Móses og Aaron.

28 ¶ Og tað hendi á tí degi *tá ið* HARRIN talaði við Móses í Egyptalandi,

29 At HARRIN talaði við Móses, sigandi, Eg *eri* HARRIN: tala tú við Pharaoh kong av Egyptalandi alt sum eg sigi við teg.

30 Og Móses segði frammi fyri HARRANUM, Sí, eg *eri* av óumskornum varrum, og hvussu skal Pharaoh geva gætur at mær?

KAPITUL 7

OG HARRIN segði við Móses, Sí, eg havi gjørt teg ein gud fyri Pharaoh: og Aaron, bróðir tín, skal vera prophetur tín.

2 Tú skalt tala alt sum eg bjóði tær: og Aaron, bróðir tín, skal tala við Pharaoh, at hann sendi Ísraels børn út úr landi sínum.

3 Og eg vil herða hjarta Pharaohs, og margfalda míni tekin og míni undur í Egyptalandi.

4 Men Pharaoh skal ikki geva gætur at tykkum, at eg má leggja mína hond uppá Egyptaland, og føra fram mínar herar, *og* mítt fólk Ísraels børn, út úr Egyptalandi við^ miklum dómum.

5 Og Egyptarnir skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg strekki út mína hond uppá Egyptaland, og føri út Ísraels børn teirra millum ífrá.

6 Og Móses og Aaron gjørdu eins og HARRIN bjóðaði teimum, soleiðis gjørdu teir.

7 Og Móses *var* fýrsinstjúgu ára gamalur, og Aaron fýrsinstjúgu og trý ára gamalur, tá ið teir talaðu við Pharaoh.

8 ¶ Og HARRIN talaði við Móses og við Aaron, sigandi,

9 Tá ið Pharaoh skal tala við tykkum, sigandi, Sýnið eitt undur fyri tykkum: tá skalt tú siga við Aaron, Tak stav tín, og kasta *hann* framfyri Pharaoh, *og* hann skal gerast ein høggormur.

10 ¶ Og Móses og Aaron fóru inn til Pharaohs, og teir gjørdu so sum HARRIN hevði boðið: og Aaron kastaði niður stav sín frammi fyri Pharaoh, og frammi fyri tænarum hansara, og hann gjørdist ein høggormur.

11 Tá kallaði Pharaoh eisini vísmenninar og galdramenninar: nú, gandakallar Egyptalands, teir eisini gjørdu á líkan hátt við sínum rúnagandanum.

12 Tí at teir kastaðu niður hvør maður stav sín, og teir gjørdust høggormar: men stavur Aarons svølgdi upp teirra stavar.

13 Og hann herdi hjarta Pharaohs, *so* at hann gav ikki gætur at teimum; eins og HARRIN hevði sagt.

14 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Pharaohs hjarta *er* hert, hann noktar at lata fólkið fara.

15 Far tær at Pharaoh í morginárið; sí, hann fer út at vatninum; og tú skalt standa við áarbakkan ímóti *tí, at* hann komi; og stavin, sum varð umskiftur til høggorm, skalt tú taka í hond tíni.

16 Og tú skalt siga við hann, HARRIN Guð Hebrēaranna hevur sent meg at tær, sigandi, Lat fólk mítt fara, at teir mega tæna mær í oyðuni: og sí, higartil vildirt tú ikki hoyra.

17 Svá sigur HARRIN, Í hesum skalt tú vita at eg *eri* HARRIN: sí, eg vil sláa við stavinum, sum *er* í hond míni, uppá vøtnini sum *eru* í ánni, og tey skulu verða umskift til blóð.

18 Og fiskurin, sum *er* í ánni, skal doyggja, og áin skal stinka; og Egyptarnir skulu vamlast *við* at drekka av vatninum úr ánni.

19 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, Sig við Aaron, Tak stav tín, og rætt út tína hond uppá Egyptalands vøtn, uppá teirra streymar, uppá teirra áir, og uppá teirra tjørnir, og uppá allar teirra hyljar av vatni, at teir mega gerast blóð; og *at* tað má verða blóð út gjøgnum alt Egyptaland, bæði í *kerum av* træi, og í *kerum av* steini.

20 Og Móses og Aaron so gjørdu, sum HARRIN bjóðaði; og hann lyfti upp stavin, og sló vøtnini, sum *vóru* í ánni, í Pharaohs eygsjón, og í eygsjónini á tænarum hansara; og øll vøtnini, sum *vóru* í ánni, vórðu umskift til blóð.

21 Og fiskurin, sum *var* í ánni, doyði; og áin stinkaði, og Egyptarnir kundu ikki drekka av vatninum úr ánni; og har var blóð út gjøgnum alt Egyptaland.

22 Og gandakallar Egyptalands gjørdu so við rúnagandanum sínum: og Pharaohs hjarta varð hert, eiheldur gav hann gætur at teimum; eins og HARRIN hevði sagt.

23 Og Pharaoh vendi og fór inn í hús sítt, eiheldur stillaði hann sítt hjarta fyri hesum eisini.

24 Og allir Egyptarnir gróvu rundan um ánna eftir vatni at drekka; tí at teir kundu ikki drekka av vatninum úr ánni.

25 Og sjey dagar vórðu uppfyltir, eftir at HARRIN hevði sligið ánna.

KAPITUL 8

OG HARRIN talaði við Móses, Far til Pharaohs, og sig við hann, Svá sigur HARRIN, Lat fólk mítt fara, at teir mega tæna mær.

2 Og um tú sýti at lata *teir* fara, sí, eg vil sláa øll tíni landamørk við froskum:

3 Og áin skal bera fram froskar ríkiligani, sum skulu fara upp og koma inn í húsið hjá tær, og inn í seingjarkamarið hjá tær, og uppá seingina hjá tær, og inn í húsið hjá tænarum tínum, og uppá fólkið hjá tær, og inn í ovnarnar hjá tær, og inn í knoðingartroðini hjá tær:

4 Og froskarnir skulu koma upp bæði á teg, og uppá fólk títt, og uppá allar tænarar tínar.

5 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, Sig við Aaron, Strekk fram tína hond við stavi tínum yvir streymarnar, yvir áirnar, og yvir tjørnirnar, og volda froskum at koma upp uppá Egyptaland.

6 Og Aaron strekti út sína hond yvir Egyptalands vøtn; og froskarnir komu upp, og huldu Egyptaland.

7 Og gandakallarnir gjørdu so við rúnagandanum sínum, og førdu upp froskar uppá Egyptaland.
8 ¶ Tá rópaði Pharaoh á Móses og Aaron, og segði, Bønið HARRAN, at hann má taka burtur froskarnar frá mær, og frá fólki mínum; og eg vil lata fólkið fara, at teir mega gera sláturofran at HARRANUM.
9 Og Móses segði við Pharaoh, Dýrd yvir mær: nær skal eg bøna fyri teg, og fyri tænarar tínar, og fyri fólk títt, at oyða froskarnar frá tær og húsum tínum, *at* teir mega verða verandi í ánni einans?
10 Og hann segði, Í morgin. Og hann segði, *Veri tað* samsvarandi við orð títt: at tú mást vita, at *tað er* eingin líkur HARRANUM Guði okkara.
11 Og froskarnir skulu víkja frá tær, og frá húsum tínum, og frá tænarum tínum, og frá fólki tínum; teir skulu verða verandi í ánni einans.
12 Og Móses og Aaron fóru út frá Pharaoh: og Móses kallaði at HARRANUM uppá grund av froskunum sum hann hevði ført ímóti Pharaoh.
13 Og HARRIN gjørdi samsvarandi við orðið hjá Mósesi; og froskarnir doyðu úr húsunum, úr bygdunum, og úr akrunum.
14 Og teir savnaðu teir saman uppá rúgvur: og landið stinkaði.
15 Men tá ið Pharaoh sá at tað var frest, herdi hann sítt hjarta, og gav ikki gætur at teimum; eins og HARRIN hevði sagt.
16 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Sig við Aaron, Rætt út stav tín, og slá støv landsins, at tað má gerast lýs út gjøgnum alt Egyptaland.
17 Og teir so gjørdu; tí at Aaron strekti út sína hond við stavi sínum, og sló støv jarðarinnar, og tað gjørdist lýs í manni, og í djóri; alt støv landsins gjørdist lýs út gjøgnum alt Egyptaland.
18 Og gandakallarnir gjørdu so við rúnagandanum sínum til at føra fram lýs, men teir kundu ikki: so tað vóru lýs uppiá manni, og uppiá djóri.
19 Tá søgdu gandakallarnir við Pharaoh, Hetta *er* Guðs fingur: og Pharaohs hjarta varð hert, og hann gav ikki gætur at teimum; eins og HARRIN hevði sagt.
20 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Rís upp árla um morgunin, og statt frammi fyri Pharaoh; sí, hann kemur fram til vatnið; og sig við hann, Svá sigur HARRIN, Lat fólk mítt fara, at teir mega tæna mær.
21 Annars, um tú vilt ikki lata fólk mítt fara, sí, eg vil senda svermar *av flugum* omanyvir teg, og omanyvir tænarar tínar, og omanyvir fólk títt, og inn í hús tíni: og húsini hjá Egyptunum skulu verða full av svermum *av flugum*, og eisini lendið, hvará teir *eru*.
22 Og eg vil atskilja á tí degi land Gó-sjën-s, í hvørjum fólk mítt dvølist, at eingir svermar *av flugum* skulu vera har; til tess endamáls *at* tú mást vita, at eg *eri* HARRIN á miðjari jørðini.
23 Og eg vil seta eina sundurskiljing ímillum fólk mítt og fólk títt: í morgin skal hetta tekin verða.
24 Og HARRIN so gjørdi; og tað kom ein herviligur svermur *av flugum* inn í húsið hjá Pharaoh, og *inn í* húsini hjá tænarum hansara, og inn í alt Egyptaland: landið varð spilt uppá grund av sverminum *av flugum*.
25 ¶ Og Pharaoh rópaði á Móses og á Aaron, og segði, Farið tit, sláturofrið til Guðs tykkara í landinum.
26 Og Móses segði, Tað er ikki sømiligt so at gera; tí at vit munnu sláturofra andstygdina hjá Egyptunum til HARRANS Guðs várs: sí,

skulu vit sláturofra andstygdina hjá Egyptunum frammi fyri eygum teirra, og vilja teir ikki steina okkum?

27 Vit vilja fara tríggja daga ferð inn í oyðuna, og sláturofra til HARRANS Guðs várs, eins og hann skal skipa okkum.

28 Og Pharaoh segði, Eg vil lata tykkum fara, at tit mega sláturofra til HARRANS Guðs tykkara í oyðuni; einans tit skulu ikki fara sera langt burtur: bønið fyri meg.

29 Og Móses segði, Sí, eg fari út frá tær, og eg vil bøna HARRAN, at svermarnir *av flugum* mega fara avstað frá Pharaoh, frá tænarum hansara, og frá fólki hans, í morgin: men lat ikki Pharaoh handla svikaliga meira í at ikki lata fólkið fara *til tess* at sláturofra til HARRANS.

30 Og Móses fór út frá Pharaoh, og bønaði HARRAN.

31 Og HARRIN gjørdi samsvarandi við orðið hjá Mósesi; og hann tók burtur svermarnar *av flugum* frá Pharaoh, frá tænarum hansara, og frá fólki hansara; har varð verandi ikki ein.

32 Og Pharaoh herdi sítt hjarta á hesum sinni við, eiheldur vildi hann lata fólkið fara.

KAPITUL 9

TÁ segði HARRIN við Móses, Far inn at Pharaoh, og sig honum, Svá sigur HARRIN Guð Hebrēaranna, Lat fólk mítt fara, at teir mega tæna mær.

2 Tí at um tú sýti at lata *teir* fara, og vilt halda teimum enn,

3 Sí, HARRANS hond er uppiá tínum fenaði sum *er* á akrinum, uppiá hestunum, uppiá asnunum, uppiá kamelunum, uppiá oksunum, og uppiá seyðinum: *tað skal vera* ein sera hervilig fenaðarsótt.

4 Og HARRIN skal skilja ímillum Ísraels fenað og Egyptalands fenað: og tað skal einkið doyggja av øllum *sum er* Ísraels barna.

5 Og HARRIN tilskilaði eina ásetta tíð, sigandi, Í morgin skal HARRIN gera hetta tingið í landinum.

6 Og HARRIN gjørdi hatta tingið á morgindeginum, og allur Egyptalands fenaður doyði: men av fenaði Ísraels barna doyði ikki ēitt.

7 Og Pharaoh sendi, og sí, har var ikki ēitt av Ísraelitanna fenaði deytt. Og Pharaohs hjarta varð hert, og hann læt ikki fólkið fara.

8 ¶ Og HARRIN segði við Móses og við Aaron, Takið at tykkum krummur av øskum úr bræðsluovninum, og lat Móses sletta tað ímóti himninum í eygsjón Pharaohs.

9 Og tað skal gerast smátt dust í øllum Egyptalandi, og skal verða svullur, brótandi fram *við* blæmum uppiá manni, og uppiá djóri, út gjøgnum alt Egyptaland.

10 Og teir tóku øskur úr bræðsluovninum, og stóðu frammi fyri Pharaoh; og Móses sletti tað upp ímóti himni; og tað varð *til* ein svull, brótandi fram *við* blæmum uppiá manni, og uppiá djóri.

11 Og gandakallarnir kundu ikki standa frammi fyri Mósesi uppá grund av svullunum; tí at svullurin var uppiá gandakøllunum, og uppiá øllum Egyptunum.

12 Og HARRIN herdi hjarta Pharaohs, og hann gav ikki gætur at teimum; eins og HARRIN hevði talað við Móses.

13 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Rís upp árla um morgunin, og statt frammi fyri Pharaoh, og sig við hann, Svá sigur HARRIN Guð Hebrēaranna, Lat fólk mítt fara, at teir mega tæna mær.

14 Tí at eg vil á hesum sinni senda allar mínar plágur omanyvir hjarta títt, og omanyvir tænarar tínar, og omanyvir fólk títt; at tú mást vita, at *tað er* eingin líka *sum* eg á allari jørðini.

15 Tí at nú vil eg rætta út hond mína, at eg má sláa teg og títt fólk við drepsótt; og tú skalt verða skorin av frá jørðini.

16 Og í sjálvari roynd *og veru,* fyri hesa *grund* havi eg reist teg upp, fyri at sýna *í* tær mátt mín; og at navn mítt má verða kunngjørt út gjøgnum alla jørðina.

17 Sum enn *er* upphevjart tú teg sjálvan ímóti fólki mínum, at tú vilt ikki lata teir fara?

18 Sí, í morgin um hesa tíð vil eg elva tí at regna ein sera herviligan hegling, slíkur sum ikki hevur verið í Egyptalandi síðan grundlegging tess, alt inntil nú.

19 Send tessvegna nú, *og* savna fenað tín, og alt sum tú hevurt á akrinum; *tí uppá* hvønn mann og *hvørt* djór, sum skulu verða funnin í akrinum, og skulu ei vera førd heim, heglingurin skal koma uppá tey, og tey skulu doyggja.

20 Hann, ið óttaðist HARRANS orð millum tænara Pharaohs, fekk tænarar sínar og fenað sín at flýggja inn í húsini:

21 Og hann, ið gav ikki gætur eftir orði HARRANS, eftirlæt tænarar sínar og fenað sín á akrinum.

22 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Strekk fram tína hond ímót himni, at tað má verða heglingur í øllum Egyptalandi, omanyvir mann, og omanyvir djór, og omanyvir hvørja urt akursins, út gjøgnum Egyptaland.

23 Og Móses strekti fram sín stav ímót himni: og HARRIN sendi toruslátt og hegling, og eldurin rann frameftir uppiá jørðini; og HARRIN regnaði hegling omanyvir Egyptaland.

24 So har varð heglingur, og eldur, blandaður við heglinginum, sera herviligt, slíkt sum tað var einkið líka *sum* tað í øllum Egyptalandi, síðan tað gjørdist ein tjóð.

25 Og heglingurin drap út gjøgnum alt Egyptaland alt sum *var* í akrinum, bæði mann og djór; og heglingurin drap hvørja urt akursins, og breyt hvørt træ akursins.

26 Einans í landi Gō´-sjĕn-s, har Ísraels børn *vóru,* var eingin heglingur.

27 ¶ Og Pharaoh sendi, og kallaði á Móses og Aaron, og segði við teir, Eg havi syndað hesa ferðina: HARRIN *er* rættvísur, og eg og fólk mítt *eru* vondir.

28 Bønið HARRAN, (tí at *tað er* nóg mikið), at tað verði eingir *fleiri* mektigir torusláttir og heglingur; og eg vil lata tykkum fara, og tit skulu ikki steðga longur.

29 Og Móses segði við hann, So skjótt sum eg eri farin út úr staðinum, vil eg breiða útum mínar hendur at HARRANUM; *og* toruslátturin skal steðga, eiheldur skal tað vera nakar meira heglingur; at tú mást vita, hvussu ið jørðin *er* HARRANS.

30 Men hvat viðvíkur tær og tænarum tínum, eg veit at tit vilja ikki enn óttast HARRAN Guð.

31 Og línið og byggið vórðu sligin: tí at byggið *var* í aksinum, og línið *var* knappað.

32 Og hveitið og speltið vórðu ikki sligin: tí at tey *vóru* ikki vaksin upp.

33 Og Móses fór út úr staðinum frá Pharaoh, og breiddi útum sínar hendur at HARRANUM: og torurnar og heglingurin hildu uppat, og regnið varð ikki helt uppá jørðina.

34 Og tá ið Pharaoh sá, at regnið og heglingurin og torusláttirnir vóru hildin uppat, syndaði hann enn meira, og herdi hjarta sítt, hann og tænarar hansara.

35 Og hjartað hjá Pharaoh varð

hert, eiheldur vildi hann lata Ísraels børn fara; eins og HARRIN hevði talað við Mósesi.

KAPITUL 10

OG HARRIN segði við Móses, Far inn til Pharaohs: tí at eg havi hert hjarta hansara, og hjartað hjá tænarum hansara, at eg mátti sýna hesi tekin míni frammi fyri honum:

2 Og at tú mást siga frá í oyru sonar tíns, og sonarsonar tíns, hvørji ting eg havi virkað í Egyptalandi, og míni tekin sum eg havi gjørt teirra millum; at tit mega vita, hvussu ið eg *eri* HARRIN.

3 Og Móses og Aaron komu inn til Pharaohs, og søgdu við hann, Svá sigur HARRIN Guð Hebrēaranna, Hvussu leingi vilt tú sýta at eyðmýkja teg sjálvan frammi fyri mær? lat fólk mítt fara, at teir mega tæna mær.

4 Annars, um tú sýti at lata fólk mítt fara, sí, í morgin vil eg føra ongspretturnar inn í bredda tín:

5 Og tær skulu dekka ásjón jarðarinnar, at ein kann ikki vera førur fyri at síggja jørðina: og tær skulu eta hitt eftirverandi av tí sum hevur komist undan, sum er eftir hjá tykkum frá heglinginum, og skulu eta hvørt træ sum veksur fyri tykkum úr akrinum:

6 Og tær skulu fylla húsini hjá tær, og húsini hjá øllum tænarum tínum, og húsini hjá øllum Egyptunum; sum hvørki fedrar tínir, ella fedrarnir hjá fedrum tínum hava sæð, síðan tann dag teir vóru uppiá jørðini, at hesum degi. Og hann vendi sær, og fór út frá Pharaoh.

7 Og Pharaohs tænarar søgdu við hann, Hvussu leingi skal hesin maðurin vera ein snerra at okkum? lat menninar fara, at teir mega tæna HARRANUM Guði sínum: veitst tú ikki enn, at Egyptaland er oyðilagt?

8 Og Móses og Aaron vórðu førdir aftur at Pharaoh: og hann segði við teir, Farið, tænið HARRANUM Guði tykkara: *men* hvørjir *eru* teir sum skulu fara?

9 Og Móses segði, Vit vilja fara við okkara ungu og við okkara gomlu, við okkara sonum og við okkara døtrum, við okkara smáfæafylgjum og við okkara stórfæafylgjum vilja vit fara; tí at vit *mugu halda* eina hátíð at HARRANUM.

10 Og hann segði við teir, Lat HARRAN vera so við tykkum, sum eg vil lata tykkum fara, og hini smáu tykkara: hyggið *til tess;* tí at ilt *er* frammanfyri tykkum.

11 Ikki so: farið nú tit *sum eru* menn, og tænið HARRANUM; tí at tað tráaðu tit. Og teir vórðu riknir út frá nærveru Pharaohs.

12 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Strekk út tína hond yvir Egyptaland fyri ongspretturnar, at tær mega koma upp uppá Egyptaland, og eta hvørja urt landsins, *enntá* alt sum heglingurin hevur eftirlatið.

13 Og Móses strekti fram stav sín yvir Egyptaland, og HARRIN førdi ein eystanvind omanyvir landið allan tann dagin, og alla *ta* náttina; *og* tá ið tað var morgun, kom eystanvindurin við ongsprettunum.

14 Og ongspretturnar fóru upp yvir alt Egyptaland, og hvíldu í øllum breddum Egyptalands: sera herviligar *vóru tær;* undan teimum vóru ongar slíkar ongsprettur sum tær, eiheldur eftir tær skulu verða slíkar.

15 Tí at tær dekkaðu alla ásjón jarðarinnar, so at landið varð myrkjað; og tær ótu hvørja urt landsins, og allan ávøkst træanna sum heglingurin hevði eftirlatið: og tað varð eftir ikki nakað grønt ting í trøunum, ella í urtum markarinnar, gjøgnum alt Egyptaland.

16 ¶ Tá kallaði Pharaoh á Móses og Aaron í skundi; og hann segði, Eg havi syndað ímóti HARRANUM Guði tykkara, og ímóti tykkum.
17 Nú tessvegna, fyrigev, eg biði teg, mína synd einans hesa ēinu ferð, og bøna HARRAN Guð tykkara, at hann má taka burtur frá mær henda deyða einans.
18 Og hann fór út frá Pharaoh, og bønaði HARRAN.
19 Og HARRIN vendi einum mektiga sterkum vestanvindi, sum tók burtur ongspretturnar, og kastaði tær inn í Reyða-havið; tað varð eftir ikki ēin ongspretta í øllum breddum Egyptalands.
20 Men HARRIN herdi hjarta Pharaohs, so at hann vildi ikki lata børn Ísraels fara.
21 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Strekk út tína hond ímót himni, at tað má verða myrkur yvir Egyptalandi, enntá myrkur *sum* kann verða merkt.
22 Og Móses strekti fram sína hond ímót himni; og tað varð eitt tjúkt myrkur í øllum Egyptalandi tríggjar dagar:
23 Teir sóu ikki hvør annan, eiheldur reis nakar frá sínum plássi í tríggjar dagar: men øll børn Ísraels høvdu ljós í býlum sínum.
24 ¶ Og Pharaoh kallaði at Mósesi, og segði, Farið tit, tænið HARRANUM; einans latið tykkara smáfæafylgir og tykkara stórfæafylgir verða helmaði: latið hini smáu tykkara eisini fara við tykkum.
25 Og Móses segði, Tú mást geva okkum eisini sláturoffur˘ og brennioffur˘, at vit mega sláturofra at HARRANUM Guði várum.
26 Okkara fenaður eisini skal fara við okkum; tað skal ikki ein kleyv verða latin eftir; tí harav mugu vit taka at tæna HARRANUM Guði várum; og vit vita ikki, við hvørjum vit mugu tæna HARRANUM, inntil vit komi hagar.
27 ¶ Men HARRIN herdi hjarta Pharaohs, og hann vildi ikki lata teir fara.
28 Og Pharaoh segði við hann, Slepp tær frá mær, ansa eftir tær, síggj mítt andlit ei meira; tí at í *tí* degi, tú sært andlit mítt, skalt tú doyggja.
29 Og Móses segði, Tú hevurt talað væl, eg vil síggja títt andlit aftur ei meira.

KAPITUL 11

OG HARRIN segði við Móses, Enn vil eg føra ēina plágu *aftrat* uppá Pharaoh, og omanyvir Egyptaland; síðani vil hann lata tykkum fara hiðani: tá ið hann skal lata *tykkum* fara, skal hann vissuliga stoyta tykkum út hiðani fullkomiliga.
2 Tala nú í oyruni á fólkinum, og lat hvønn mann læna frá granna sínum, og hvørja kvinnu frá granna sínum, smúkkur av silvuri, og smúkkur av gulli.
3 Og HARRIN gav fólkinum tokka í eygsjón Egyptanna. Harafturat *var* maðurin Móses sera mikil í Egyptalandi, í eygsjónini á tænarum Pharaohs, og í eygsjón fólksins.
4 Og Móses segði, Svá sigur HARRIN, Umkring midnátt vil eg fara út í miðju Egyptalands:
5 Og allir hinir frumbornu í Egyptalandi skulu doyggja, frá hinum frumborna hjá Pharaoh sum situr uppiá hásæti sínum, alt at hinum frumborna hjá tænastugentuni sum *er* aftanfyri kvørnina; og allir hinir frumbornu hjá djórum.
6 Og tað skal verða eitt mikið róp út gjøgnum alt Egyptaland, slíkt sum tað var einkið líka *sum* tað, ella skal verða líka *sum* tað meira.
7 Men ímóti nøkrum av Ísraels børnum skal ikki ein hundur flyta sína tungu, ímóti manni ella

djóri: at tit mega vita, hvussu ið HARRIN setur ein greinarmun ímillum Egyptarnar og Ísrael.

8 Og allir hesir tænarar tínir skulu koma niður at mær, og boyggja niður seg sjálvar at mær, sigandi, Slepp tær út, og alt fólkið sum fylgja tær: og eftir tað vil eg fara út. Og hann fór út frá Pharaoh í eini miklari firtni.

9 Og HARRIN segði við Móses, Pharaoh skal ikki geva gætur at tykkum; at míni undur mega verða margfaldað í Egyptalandi.

10 Og Móses og Aaron gjørdu øll hesi undrini frammi fyri Pharaoh: og HARRIN herdi hjarta Pharaohs, so at hann vildi ikki lata børn Ísraels fara út úr landi sínum.

KAPITUL 12

OG HARRIN talaði við Móses og Aaron í Egyptalandi, sigandi,

2 Hesin mánaðurin *skal vera* hjá tykkum byrjanin av mánaðum: hann *skal vera* hin fyrsti mánaður ársins fyri tykkum.

3 ¶ Talið tit við alla samkomu Ísraels, sigandi, Á tí tíggjunda *deginum* av hesum mánaðinum skulu teir taka til sín hvør maður eitt lamb, samsvarandi við hús fedra *sína,* eitt lamb til eitt hús:

4 Og um húskið veri ov lítið fyri lambið, lat hann og granna hansara næst húsi hansara taka *tað* samsvarandi við talið á sálunum; hvør maður samsvarandi við sína eting skal inna tykkara teljing fyri lambið.

5 Tykkara lamb skal vera uttan lýti, eitt fyrsta árs veður*lamb:* tit skulu taka *tað* út frá seyðunum, ella frá geitunum:

6 Og tit skulu goyma tað fram inntil hin fjúrtanda dagin av hinum sama mánaðinum: og allur savnaðurin av samkomu Ísraels skal drepa tað um kvøldið.

7 Og teir skulu taka av blóðinum, og rýða *tað* á teir tveir síðustavirnar og á tann ovara durastavin av húsinum, hvarí teir skulu eta tað.

8 Og teir skulu eta kjøtið í teirri náttini, steikt við eldi, og ósúrgað breyð; *og* við beiskum *urtum* skulu teir eta tað.

9 Etið ikki av tí rátt, ella soðið yvirhøvur við vatni, men steikt *við* eldi; hans høvd við hansara leggjum, og við innvøli tess.

10 Og tit skulu einkið av tí lata verða eftir inntil morgunin; og tað, sum er eftir av tí inntil morgunin, skulu tit brenna við eldi.

11 ¶ Og soleiðis skulu tit eta tað; *við* tykkara lendum gyrdum, tykkara skógvum á tykkara fótum, og tykkara stavi í tykkara hond; og tit skulu eta tað í skundi: tað *er* umleyp HARRANS.

12 Tí at eg vil fara ígjøgnum Egyptaland hesa nátt, og vil sláa allar hinar frumbornu í Egyptalandi, bæði mann og djór; og ímóti øllum Egyptalands gudum vil eg útinna dóm: eg *eri* HARRIN.

13 Og blóðið skal vera hjá tykkum til eitt tekin uppiá húsunum har tit *eru:* og tá ið eg síggi blóðið, vil eg leypa um tykkum, og plágan skal ikki vera uppiá tykkum til at oyða *tykkum,* tá ið eg slái Egyptaland.

14 Og hesin dagurin skal vera tykkum til eitt minni; og tit skulu halda hann eina hátíð fyri HARRANUM út gjøgnum ættir tykkara; tit skulu halda hann eina hátíð eftir eini regluskipan um ævir.

15 Sjey dagar skulu tit eta ósúrgað breyð; enntá hin fyrsta dagin skulu tit beina burtur súrdeiggj út úr húsum tykkara: tí at hvørsumhelst *ið* etur súrgað breyð frá hinum fyrsta degi inntil hin sjeynda dagin, tann sál skal verða skorin av frá Ísrael.

16 Og í hinum fyrsta degi *skal vera* ein heilag samankalling, og í hinum sjeynda degi skal vera ein heilag samankalling hjá tykkum; einkið háttarlag av arbeiði skal verða gjørt í teimum, uttan *tað* sum hvør maður má eta, tað einans kann verða gjørt av tykkum.

17 Og tit skulu halda *hátíð* ósúrgaðs breyðs; tí at í sjálvum hesum sama deginum havi eg ført tykkara herar út úr Egyptalandi: tí skulu tit halda henda dagin í ættarliðum tykkara við eini reglugerð um ævir.

18 ¶ Í hinum fyrsta *mánaði,* á hinum fjúrtanda degi mánaðarins um aftan, skulu tit eta ósúrgað breyð, inntil hin ēin og tjúgunda dag mánaðarins um aftan.

19 Sjey dagar skal einkið súrdeiggj finnast í húsum tykkara: tí at hvørsumhelst *ið* etur tað sum er súrgað, enntá handa sál skal verða skorin av frá samkomu Ísraels, hvørt hann veri ein fremmandur, ella føddur í landinum.

20 Tit skulu einkið súrgað eta; í øllum tykkara bústøðum skulu tit eta ósúrgað breyð.

21 ¶ Tá rópaði Móses á allar hinar elstu av Ísrael, og segði við teir, Drívið *tykkum* út og takið tykkum eitt lamb samsvarandi við familjur tykkara, og drepið umleypið.

22 Og tit skulu taka eitt tyssi av ýsopi, og dyppa *tað* í blóðið sum *er* í karinum, og rýða duratræið og teir tveir síðustavirnar við blóðinum sum *er* í karinum; og eingin av tykkum skal fara út um hurðina av húsi sínum, inntil morgunin.

23 Tí at HARRIN vil fara ígjøgnum til at sláa Egyptarnar; og tá ið hann sær blóðið uppiá duratræinum, og á síðustavunum tveim, vil HARRIN loypa um hurðina, og vil ikki loyva oyðaranum at koma inn at tykkara húsum til at sláa *tykkum*.

24 Og tit skulu geva ans eftir hesum tingi til eina regluskipan til tín og til synir tínar um ævir.

25 Og tað skal bera á, tá ið tit veri komnir til landið sum HARRIN vil geva tykkum, samsvarandi sum hann hevur fyrijáttað, at tit skulu halda hesa tænastu.

26 Og tað skal bera á, tá ið tykkara børn skulu siga við tykkum, Hvat meina tit við hesi tænastu?

27 At tit skulu siga, Tað *er* sláturoffur umleyps HARRANS, sum leyp um húsini hjá Ísraels børnum í Egyptalandi, tá ið hann sló Egyptarnar, og útfríaði húsini hjá okkum. Og fólkið boygdi høvdið og tilbað.

28 Og Ísraels børn fóru avstað, og gjørdu eins og HARRIN hevði boðið Mósesi og Aaroni, soleiðis gjørdu tey.

29 ¶ Og tað bar á, at á midnátt sló HARRIN allar hinar frumbornu í Egyptalandi, frá hinum frumborna hjá Pharaoh sum sat á hásæti sínum, at hinum frumborna hins fangaða sum *var* í fangatippinum; og allar hinar frumbornu hjá fenaði.

30 Og Pharaoh reis upp um náttina, hann, og allir hansara tænarar, og allir Egyptarnir; og tað varð eitt mikið róp í Egyptalandi; tí at *tað var* ikki eitt hús, har *tað var* ikki ēin deyður.

31 ¶ Og hann kallaði á Móses og Aaron um nátt*ina,* og segði, Rísið upp, *og* komið tykkum fram burturúr fólki mínum, bæði tit og børn Ísraels; og farið, tænið HARRANUM, eins og tit hava sagt.

32 Eisini takið tykkara smáfæafylgir og tykkara stórfæafylgir, sum tit hava sagt, og verið farnir; og vælsignið meg eisini.

33 Og Egyparnir vóru áskorandi uppá fólkið, at teir máttu senda teir út úr landinum í hasti; tí at teir søgdu, Vit *veri* allir deyðir *menn*.

34 Og fólkið tók deiggj sítt áðrenn tað var súrgað, knoðitroðini hjá teimum verandi ballaði inn í teirra klæðir uppiá teirra herðum.

35 Og Ísraels børn gjørdu samsvarandi við orðið hjá Mósesi; og tey læntu frá Egyptunum smúkkur av silvuri, og smúkkur av gulli, og klædnað:

36 Og HARRIN gav fólkinum tokka í eygsjónini á Egyptunum, so at tey læntu teimum *slík ting sum teim kravdust*. Og tey rændu Egyptarnar.

37 ¶ Og Ísraels børn ferðaðust frá Răm´-ĕ-sês til Sŭc´-cōth, umleið seks hundrað túsund til fóts *sum vóru* menn, umframt børn.

38 Og ein blandað fjøld fór upp eisini við teimum; og smáfæafylgir, og stórfæafylgir, *enntá* sera nógvur fenaður.

39 Og tey bakaðu ósúrgaðar køkur av deignum, sum tey førdu fram úr Egyptalandi, tí at tað var ikki súrgað; vegna tess *at* tey vórðu stoytt út úr Egyptalandi, og kundu ikki dvølja, eiheldur høvdu tey fyribúgvið til sín sjálvs nakra vist.

40 ¶ Nú, útisiting Ísraels barna, sum dvaldust í Egyptalandi, *var* fýra hundrað og tríati ár.

41 Og tað bar á við endan á teimum fýra hundrað og tríati árunum, enntá sjálvan hin sama dagin bar tað á, at øll herlið HARRANS fóru út frá Egyptalandi.

42 Tað *er* ein nátt at verða nógv givin ans eftir at HARRANUM, fyri at føra teir út frá Egyptalandi: hetta *er* handan nátt HARRANS at verða givin ans eftir av øllum børnum Ísraels í ættum sínum.

43 ¶ Og HARRIN segði við Móses og Aaron, Hetta *er* regluskipan umleypsins: Tað skal eingin fremmandur eta av tí:

44 Men hvørs mans tænari, sum er keyptur fyri pening, tá ið tú hevurt umskorið hann, tá skal hann eta harav.

45 Ein útlendingur og ein leigaður tænari skal ikki eta harav.

46 Í ēinum húsi skal tað verða etið; tú skalt ikki bera fram nakað av kjøtinum útum út úr húsinum; eiheldur skulu tit bróta eitt bein harhjá.

47 Allur savnaður Ísraels skal halda tað.

48 Og tá ið ein fremmandur skal útisita hjá tær, og vil halda umleypið fyri HARRANUM, lat allar hansara hannar verða umskornar, og síðan lat hann koma nær og halda tað; og hann skal vera sum ēin sum er føddur í landinum: tí at eingin óumskorin persónur skal eta harav.

49 Ēin lóg skal vera fyri hann sum er inniborin, og yvirfyri tí fremmanda sum útisitur tykkara millum.

50 Svá gjørdu øll børn Ísraels; eins og HARRIN skipaði Mósesi og Aaroni, soleiðis gjørdu teir.

51 Og tað bar á sjálvan hin sama dagin, *at* HARRIN førdi børn Ísraels út úr Egyptalandi eftir herum teirra.

KAPITUL 13

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Halga mær allar teir frumbornu, hvatsumhelst *ið* opnar móðurlívið millum Ísraels barna, *bæði* av manni og av djóri: tað *er* mítt.

3 ¶ Og Móses segði við fólkið, Minnist henda dag, í hvørjum tit komu út frá Egyptalandi, út úr trældóms-húsinum; tí við handarstyrki førdi HARRIN tykkum út frá hesum *plássi:* tað skal einkið súrgað breyð verða etið.

4 Henda dag komu tit út, í mánaðinum Ábib.

5 ¶ Og tað skal verða, tá ið HARRIN skal føra teg inn í land Cānaanitanna, og Hittitanna, og Amoritanna, og Hī-vīt´-anna, og

Jĕb-ŭ-sīt´-anna, hvørt hann svór tínum fedrum at geva tær, eitt land fløðandi við mjólk og hunangi, at tú skalt halda hesa tænastu í hesum mánaði.

6 Sjey dagar skalt tú eta ósúrgað breyð, og í tí sjeynda deginum *skal vera* ein hátíð fyri HARRANUM.

7 Ósúrgað breyð skal verða etið sjey dagar; og tað skal einkið súrgað breyð verða sæð hjá tær, eiheldur skal súrdeiggj verða sæð hjá tær í øllum *heraðs*hornum tínum.

8 ¶ Og tú skalt sýna syni tínum á tí degi, sigandi, *Hetta verður gjørt* uppá grund av tí *sum* HARRIN gjørdi mær, tá ið eg kom fram út úr Egyptalandi.

9 Og tað skal vera tær til eitt tekin uppiá hond tíni, og til eitt minni ímillum eygu tíni, at HARRANS lóg má vera í munni tínum: tí við sterkari hond hevur HARRIN ført teg út úr Egyptalandi.

10 Tú skalt tessvegna halda hesa regluskipan í tíðum sínum frá ári til árs.

11 ¶ Og tað skal verða, tá ið HARRIN skal føra teg inn í land Cānaanitanna, eins og hann svór tær og fyri fedrum tínum, og skal geva tær tað,

12 At tú skalt seta HARRANUM fyri seg alt sum opnar móðurlívið, og hvørt frumavkom sum kemur av einum djóri sum tú hevurt; hannarnir *skulu vera* HARRANS.

13 Og hvørt frumavkom av einum asna skalt tú endurloysa við einum lambi; og um tú vilt ikki endurloysa hann, tá skalt tú bróta háls hansara: og allar teir frumbornu hjá manni millum barna tína skalt tú endurloysa.

14 ¶ Og tað skal verða, tá ið sonur tín spyr teg í tíðini sum koma skal, sigandi, Hvat *er* hetta? at tú skalt siga við hann, Við handarstyrki førdi HARRIN okkum út frá Egyptalandi, frá trældóms-húsinum:

15 Og tað bar á, tá ið Pharaoh vildi treyðugt lata okkum fara, at HARRIN vá allar teir frumbornu í Egyptalandi, bæði teir frumbornu hjá manni, og teir frumbornu hjá djóri: tí sláturofri eg til HARRANS alt sum opnar móðurlívið, verandi hannar; men allar teir frumbornu av mínum børnum endurloysi eg.

16 Og tað skal vera til eitt tekin uppiá hond tíni, og til ennisbond ímillum eygu tíni: tí við handarstyrki førdi HARRIN okkum fram út úr Egyptalandi.

17 ¶ Og tað bar á, tá ið Pharaoh hevði latið fólkið fara, at Guð leiddi teir ikki *gjøgnum* veg Philistalandsins, hóast hann *var* nær; tí at Guð segði, At ikki møguligvís fólkið iðrist, tá ið teir síggja kríggj, og teir vendi aftur til Egyptalands:

18 Men Guð leiddi fólkið umkring, *gjøgnum* veg Reyða-havs oyðunnar: og Ísraels børn løgdu avstað vígbúnir út úr Egyptalandi.

19 Og Móses tók beinini hjá Jósephi við sær: tí at hann hevði strangligani svorið Ísraels børnum, sigandi, Guð vil vissuligani vitja tykkum; og tit skulu bera upp míni bein burtur hiðani við tykkum.

20 ¶ Og teir tóku ferð sína frá Sūc´-cōth, og leiraðust í Ē´-thăm, á tromini av oyðuni.

21 Og HARRIN fór frammanfyri teimum um dag*in* í einum stólpa av einum skýggi, til at leiða teir vegin; og um nátt*ina* í einum stólpa av eldi, til at geva teimum ljós; til at fara um dag*in* og um nátt*ina:*

22 Hann tók ikki burtur stólpan av skýgginum um dag*in,* ella stólpan av eldi um nátt*ina,* frammi fyri fólkinum *ífrá.*

KAPITUL 14

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við børn Ísraels, at teir snúgvi og leirist frammanfyri Pī-hă-hī´-rōth, ímillum Mīg´-dōl og sjógvin, yvir av Bā´-ăl-zē´-phŏn: frammanfyri tí skulu tit leirast við sjógvin.

3 Tí at Pharaoh vil siga um Ísraels børn, Teir *eru* innvavdir í landinum, oyðan hevur byrgt teir inni.

4 Og eg vil herða hjarta Pharaohs, at hann skal fylgja aftaná teimum; og eg vil verða æraður uppiá Pharaoh, og uppiá øllum herliði hans; at Egyptarnir mega vita, at eg *eri* HARRIN. Og teir so gjørdu.

5 ¶ Og tað varð sagt kongi Egyptalands, at fólkið flýddi: og hjartað hjá Pharaoh og hjá hansara tænarum varð vent ímóti fólkinum, og teir søgdu, Hví hava vit gjørt hetta, at vit hava latið Ísrael fara frá *at* tæna okkum?

6 Og hann gjørdi tilreiðar vagn sín, og tók fólk sítt við sær:

7 Og hann tók seks hundrað útvaldar vagnar, og allar vagnar Egyptalands, og høvuðsmenn yvir hvørjum *og* ēinum teirra.

8 Og HARRIN herdi hjarta Pharaohs, Egyptalands kongs, og hann elti eftir Ísraels børnum: og Ísraels børn fóru út við eini høgari hond.

9 Men Egyptarnir eltu eftir teimum, allir hestar *og* vagnar Pharaohs, og hestmenn hans, og herur hans, og innheintaðu teir, leirandi við sjógvin, við síðuna av Pī-hă-hī´-rōth, frammanfyri Bā´-ăl-zē´-phŏn.

10 ¶ Og tá ið Pharaoh drógst nær, lyftu børn Ísraels upp eygum sínum, og sí, Egyptarnir hergingu eftir teimum; og teir vórðu sára ræddir: og Ísraels børn róptu út at HARRANUM.

11 Og teir søgdu við Móses, Av tí at *tað vóru* ongar gravir í Egyptalandi, hevurt tú tikið okkum burtur til at doyggja í oyðuni? hvørsvegna hevurt tú farið soleiðis við okkum, at føra okkum fram út úr Egyptalandi?

12 *Er* ikki hetta orðið sum vit søgdu tær í Egyptalandi, sigandi, Lat okkum vera, at vit mega tæna Egyptunum? Tí at *tað hevði verið* betri hjá okkum at tænt Egyptunum, enn at vit skuldu doyggja í oyðuni.

13 ¶ Og Móses segði við fólkið, Óttist tit ikki, standið stillir, og síggið frelsu HARRANS, sum hann vil sýna fyri tykkum í dag: tí at Egyptarnar, hvørjar tit hava sæð í dag, tit skulu síggja teir aftur ei meira um ævir.

14 HARRIN skal berjast fyri tykkum, og tit skulu halda friði tykkara.

15 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Hvørsvegna rópart tú á meg? tala við Ísraels børn, at teir fari frameftir:

16 Men lyft tú upp stav tín, og rætt út tína hond yvir sjógvin, og sundurskift hann: og Ísraels børn skulu fara á turrari *jørð* ígjøgnum miðjan sjógvin.

17 Og eg, sí, eg vil herða hjørtu Egyptanna, og teir skulu fylgja teimum: og eg vil fáa mær heiður uppiá Pharaoh, og uppiá øllum heri hans, uppiá vagnum hans, og uppiá hestmonnum hans.

18 Og Egyptarnir skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg havi fingið mær heiður uppiá Pharaoh, uppiá vagnum hans, og uppiá hestmonnum hans.

19 ¶ Og Guðs eingil, sum fór undan leiri Ísraels, flutti *seg* burt og fór afturum teir; og stólpin av skýgginum fór frammi fyri andliti teirra ifrá, og stóð aftanfyri teir:

20 Og hann kom ímillum leirin hjá Egyptunum og leirin hjá

Ísrael; og hann var eitt skýggj og myrkur *fyri teimum,* men hann gav ljós um nátt*ina fyri hesum:* so at teir ēinu komu ikki nær hīnum alla náttina.

21 Og Móses rætti út sína hond yvir sjógvin; og HARRIN elvdi sjónum at fara *aftur* við einum sterkum eystanvindi alla ta náttina, og gjørdi sjógvin *til* turt *land,* og vøtnini vórðu sundurskift.

22 Og Ísraels børn fóru inn í miðjan sjógvin uppiá tí turru *jørðini:* og vøtnini *vóru* ein veggur hjá teimum á teirra høgru hond, og á teirra vinstru.

23 ¶ Og Egyptarnir eltu, og fóru inn eftir teimum til miðjan sjógvin, *enntá* allir hestar Pharaohs, vagnar hans, og hestmenn hans.

24 Og tað bar á, at á morgunvøkuni hugdi HARRIN á herliðið hjá Egyptunum ígjøgnum súluna av eldi og av skýgginum, og órógvaði herliðið hjá Egyptunum,

25 Og tók av teirra vagnhjól˙, at teir óku teir tungligani: so at Egyptarnir søgdu, Latum okkum flýggja frá ásjón Ísraels; tí at HARRIN berjist fyri teir ímóti Egyptunum.

26 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Rætt út tína hond yvir sjógvin, at vøtnini mega koma aftur omanyvir Egyptarnar, omanyvir vagnar teirra, og omanyvir hestmenn teirra.

27 Og Móses rætti fram sína hond yvir sjógvin, og sjógvurin vendi aftur til sína styrki, tá ið morgunin birtist; og Egyptarnir flýddu ímóti honum; og HARRIN kollrendi Egyptarnar í miðjum sjónum.

28 Og vøtnini vendu aftur, og huldu vagnarnar, og hestmenninar, *og* alt herliðið hjá Pharaoh sum kom inn í sjógvin eftir teimum; har varð eftir ikki so mikið sum ēin av teimum.

29 Men Ísraels børn gingu uppiá turrum *landi* í miðjum sjónum; og vøtnini *vóru* ein veggur hjá teimum á teirra høgru hond, og á teirra vinstru.

30 Svá frelsti HARRIN Ísrael tann dagin út úr hondini á Egyptunum; og Ísrael sá Egyptarnar deyðar uppiá sævarstrondini.

31 Og Ísrael sá hatta mikla verk, sum HARRIN gjørdi uppá Egyptarnar: og fólkið óttaðist HARRAN, og trúði HARRANUM, og hansara tænara Mósesi.

KAPITUL 15

TÁ sungu Móses og Ísraels børn henda song at HARRANUM, og talaðu, sigandi, Eg vil syngja at HARRANUM, tí at hann hevur stórsigrað dýrdsamligani: hestin og reiðmann hansara hevur hann kastað inn í sjógvin.

2 HARRIN *er* mín styrki og songur, og hann er vorðin mín frelsa: hann *er* Guð mín, og eg vil fyribúgva honum ein bústað; faðirs míns Guð, og eg vil upphevja hann.

3 HARRIN *er* ein krígsmaður: HARRIN *er* navn hansara.

4 Pharaohs vagnar og hansara her hevur hann kastað í sjógvin: hans útvøldu høvuðsmenn eisini eru druknaðir í Reyða-havinum.

5 Dýpdirnar hava hult teir: teir sukku á botnin sum ein steinur.

6 Tín høgra hond, O HARRI, er vorðin dýrdsom í kraft: tín høgra hond, O HARRI, hevur smekkað í stykkir figgindan.

7 Og í mikilleikanum av tíni avbærni hevurt tú kollrent teir sum risu upp ímóti tær: tú sendirt fram tína vreiði, *sum* upptærdi teir sum hálm.

8 Og við blástrinum av tínum nasum vórðu vøtnini savnaði saman, flóðirnar stóðu upprættar sum ein rúgva, *og* dýpdirnar vórðu stívnaðar í hjarta havsins.

9 Fíggindin segði, Eg vil elta, eg vil innheinta, eg vil deila herfongin; mín girnd skal verða nøktað uppiá teimum; eg vil draga mítt svørð, mín hond skal oyða teir.

10 Við tínum vindi tú blástirt, sjógvurin huldi teir: teir sukku sum blýggj í teimum mektigu vøtnunum.

11 Hvør *er* líkur tær, O HARRI, millum gudanna? hvør *er* líka *sum* tú, dýrdsamur í heilagleika, óttaligur *í lov*prís*ing*um, gerandi undur˙?

12 Tú strektirt út tína høgru hond, jørðin svølgdi teir.

13 Tú, í tíni miskunn, hevurt leitt fram fólkið, *sum* tú hevurt endurloyst: tú hevurt vegleitt *teir* í tíni styrki at tínum heilaga bústaði.

14 Fólkið skal hoyra, *og* vera bangið: sorg skal taka hald á íbúgvum Palestinu.

15 Tá skulu hertogar Ē´-dóm-s ógvast; hinir mektigu menn Móabs, skelvandi skulu taka hald uppá teir; allir íbúgvar Cānaans skulu bráðna burtur.

16 Ótti og ønskur skal falla uppá teir; við mikilleikanum av tínum armi skulu teir vera *so* stillir sum ein steinur; til títt fólk fari yvirum, O HARRI, til fólkið fari yvirum, *sum* tú hevurt keypt.

17 Tú skalt føra teir inn, og planta teir á fjalli arvs tíns, *í* tí plássi, O HARRI, *sum* tú hevurt gjørt til tín at dvøljast í, *í* Halgidóminum, O Harri, *sum* tínar hendur hava grundað.

18 HARRIN skal ríkja um ævir og ævir.

19 Tí at Pharaohs hestur fór inn við hansara vagnum og við hans hestmonnum í sjógvin, og HARRIN førdi aftur vøtn havsins omanyvir teir; men Ísraels børn fóru á turrum *landi* í miðjum sjónum.

20 ¶ Og prophetinnan Mirjam, systir Aarons, tók eina tamburīn í sína hond; og allar kvinnurnar fóru út aftaná henni við tamburīnum og við dansum.

21 Og Mirjam svaraði teimum, Syngið tit til HARRANS, tí at hann hevur dýrdsamligani stórsigrað; hestin og reiðmann hansara hevur hann kastað inn í sjógvin.

22 So Móses førdi Israel frá Reyða-havinum, og teir fóru út í Sjūrs oyðu; og teir fóru tríggjar dagar í oyðuni, og funnu einkið vatn.

23 ¶ Og tá ið teir komu til Már´-āh, kundu teir ikki drekka av vøtnum Már´-ūh, tí at tey *vóru* beisk: tí varð navnið á tí kallað Már´-āh.

24 Og fólkið meylaði ímóti Mósesi, sigandi, Hvat skulu vit drekka?

25 Og hann rópti á HARRAN; og HARRIN sýndi honum eitt træ, *hvørt,* tá ið hann hevði kastað inn í vøtnini, vórðu vøtnini gjørd søt: har gjørdi hann til teirra eina áseting og eina regluskipan, og har royndi hann teir,

26 Og segði, Um tú vilt dúgligani geva gætur eftir rødd HARRANS Guðs tíns, og vilt gera tað sum er rætt í eygsjón hans, og vilt leggja oyra til boðini hjá honum, og halda allar ásetingar hans, *so* vil eg ongan av hesum sjúkdómunum leggja uppá teg, sum eg havi ført omanyvir Egyptarnar: tí at eg *eri* HARRIN sum grøðir teg.

27 ¶ Og teir komu til Ē´-līm, har *tað vóru* tólv keldur av vatni, og trísinstjúgu og tíggju pálmatrø: og teir leiraðust har við vøtnini.

KAPITUL 16

OG teir tóku sína ferð frá Ē´-līm, og øll samkoma Ísraels barna kom til Sīn-s oyðu, sum *er* ímillum Ē´-līm og Sï´-nâi, á hinum

fimtanda degi hins annars mánaðar eftir teirra avstaðfaring út úr Egyptalandi.

2 Og øll samkoma Ísraels barna meylaði ímóti Mósesi og Aaroni í oyðuni:

3 Og Ísraels børn søgdu við teir, Gævi Guð vit høvdu doyð fyri HARRANS hond í Egyptalandi, tá ið vit sótu við kjøtgrýturnar, *og* tá ið vit ótu breyð til hins fulnar; tí at tit hava fært okkum út í hesa oyðuna, til at drepa allan henda savnað við hungri.

4 ¶ Tá segði HARRIN við Móses, Sí, eg vil regna breyð frá himni fyri tykkum; og fólkið skal fara út og savna ein ávísan skamt hvønn dag, at eg má royna teir, hvørt teir vilji ganga í míni lóg, ella ikki.

5 Og tað skal bera á, at á hinum sætta degi skulu tey fyribúgva *tað* sum tey føra inn; og tað skal vera tvær ferðir so nógv sum tey savna dagliga.

6 Og Móses og Aaron søgdu við øll børn Ísraels, Um aftan, tá skulu tit vita, at HARRIN hevur fært tykkum út frá Egyptalandi:

7 Og í morgisárið, tá skulu tit síggja dýrd HARRANS; tí at hann hoyrir tykkara meylanir ímóti HARRANUM: og hvat *eru* vit, at tit meyla ímóti okkum?

8 Og Móses segði, *Hetta skal verða,* tá ið HARRIN skal geva tykkum um kvøldið kjøt at eta, og um morgunin breyð til hins fulnar; tí at HARRIN hoyrir tykkara meylanir, sum tit meyla ímóti honum: og hvat *eru* vit? tykkara meylanir *eru* ikki ímóti okkum, men ímóti HARRANUM.

9 ¶ Og Móses talaði við Aaron, Sig við alla samkomu Ísraels barna, Komið nær framfyri HARRAN: tí at hann hevur hoyrt tykkara meylanir.

10 Og tað bar á, sum Aaron talaði við alla samkomu Ísraels barna, at teir hugdu ímóti oyðuni, og sí, HARRANS dýrd birtist í skýgginum.

11 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

12 Eg havi hoyrt meylanir Ísraels barna: tala við teir, sigandi, Um aftan skulu tit eta kjøt, og um morgunin skulu tit verða mettaðir við breyði; og tit skulu vita, at eg eri HARRIN Guð tykkara.

13 Og tað bar á, at um aftan komu lynghøsnini upp, og huldu leirin: og um morgunin lá døggin rundan um herliðið.

14 Og tá ið døggin, sum lá, var farin upp, sí, uppiá ásjónini á oyðuni *lá* eitt smátt, runt ting, *so* smátt sum rímfrostið á jørðini.

15 Og tá ið Ísraels børn sóu *tað,* søgdu tey hvør til annan, Tað *er* mán´-nă: tí at tey vistu ikki hvat tað *var.* Og Móses segði við tey, Hetta *er* breyðið sum HARRIN hevur givið tykkum at eta.

16 ¶ Hetta *er* tað tingið sum HARRIN hevur boðið, Savnið av tí hvør maður samsvarandi við eting hans, eina ō´-mër til hvønn mann, *samsvarandi við* talið á persónum tykkara; takið tit hvør maður til *teirra* sum *eru* í tjøldum hans.

17 Og Ísraels børn so gjørdu, og savnaðu, summir meira, summir minni.

18 Og tá ið teir mátaðu *tað* við eini ō´-mër, hevði hann, sum savnaði mikið, einkið *til* yvirs; og hann, sum savnaði lítið, hevði einkið trot; teir savnaðu hvør maður samsvarandi við eting hans.

19 Og Móses segði, Lat ongan mann eftirlata av tí til morgunin.

20 Hóast hetta, teir góvu ikki gætur at Mósesi; men summir av teimum eftirlótu av tí inntil morgunin, og tað ól ormar, og

stinkaði: og Móses var vreiður við teir.

21 Og teir savnaðu tað hvønn morgun, hvør maður samsvarandi við eting hans: og tá ið sólin vaks heit, smeltaði tað.

22 ¶ Og tað bar á, *at* á tí sætta deginum savnaðu teir tvær ferðir so nógv breyð, tveir ō´-mĕr-ar til ēin *mann:* og allir stjórnararnir av samkomuni komu og taldu Mósesi.

23 Og hann segði við teir, Hetta *er tað* sum HARRIN hevur sagt, Í morgin *er* hvíld hins heilaga sabbats at HARRANUM: bakið *tað,* sum tit vilja baka, *í dag,* og sjóðið tað, *sum* tit vilja sjóða; og tað, sum verður *til* yvirs, leggið niðurfyri til tykkum at verða goymt inntil morgunin.

24 Og teir løgdu tað niðurfyri til morgunin, eins og Móses beyð: og tað stinkaði ikki, eiheldur var nakar ormur harí.

25 Og Móses segði, Etið hatta í dag; tí at í dag *er* ein sabbatur at HARRANUM: í dag skulu tit ikki finna tað í akrinum.

26 Seks dagar skulu tit savna tað; men á hinum sjeynda degi, *sum er* sabbaturin, á honum skal einkið vera.

27 ¶ Og tað bar á, *at* tað fóru út *summir* av fólkinum á hinum sjeynda degi fyri at savna, og teir funnu einkið.

28 Og HARRIN segði við Móses, Hvussu leingi nokta tit at halda boðini hjá mær og lógirnar hjá mær?

29 Síggið, fyri tað *at* HARRIN hevur givið tykkum sabbatin, tí gevur hann tykkum á hinum sætta degi tveggja daga breyð; verðið tit hvør maður á sínum plássi, latið ongan mann fara út úr sínum plássi á hinum sjeynda degi.

30 So fólkið hvíldi á hinum sjeynda degi.

31 Og Ísraels hús kallaði navnið á tí măn´-nă: og tað *var* líka *sum* koriandur fræ, hvítt; og smakkurin á tí *var* líka *sum* vaflur, *gjørdar* við hunangi.

32 ¶ Og Móses segði, Hetta *er* tað tingið sum HARRIN beyð, Fyllið ein ō´-mĕr av tí til at verða goymt til ættarliðir tykkara; at tey mega síggja breyðið, við hvørjum eg havi føtt tykkum í oyðuni, tá ið eg førdi tykkum fram frá Egyptalandi.

33 Og Móses segði við Aaron, Tak eina krukku, og koyr ein fullan ō´-mĕr av măn´-nă harí, og legg tað niðurfyri frammi fyri HARRANUM, at verða goymt til ættarliðir tykkara.

34 Eins og HARRIN skipaði Mósesi, soleiðis legði Aaron tað niðurfyri frammanfyri Vitnisburðin, at verða goymt.

35 Og Ísraels børn ótu măn´-nă fjøruti ár, inntil teir komu til eitt land *sum var* íbúgvið; teir ótu măn´-nă, inntil teir komu at mørkum Cānaans lands.

36 Nú, ein ō´-mĕr *er* tíggjundi-*parturin* av eini ē´-phŭh.

KAPITUL 17

OG øll samkoma Ísraels barna ferðaðist frá Sīns oyðu, eftir ferðum sínum, samsvarandi við ábjóðing HARRANS, og slógu upp í Rēph´-ĭ-dĭm: og *har var* einkið vatn hjá fólkinum at drekka.

2 Hvørsvegna fólkið skeldaði við Móses, og segði, Gev okkum vatn, at vit mega drekka. Og Móses segði við teir, Hví skelda tit við meg? hvørsvegna freista tit HARRAN?

3 Og fólkinum tyrsti har eftir vatni; og fólkið meylaði ímóti Mósesi, og segði, Hvørsvegna *er* hetta, *at* tú hevurt ført okkum upp út úr Egyptalandi, til at drepa okkum og okkara børn og okkara fenað við torsta?

4 Og Móses ópti á HARRAN, sigandi, Hvat skal eg gera hesum fólkinum? teir veri nærum tilreiðar at steina meg.

5 Og HARRIN segði við Móses, Far áfram framfyri fólkið, og tak við tær av hinum elstu av Ísrael; og tín stav, við hvørjum tú slóst ánna, tak í tína hond, og far.

6 Sí, eg vil standa frammanfyri tær har uppiá klettinum á Hór-ēb; og tú skalt sláa klettin, og tað skal koma vatn út úr honum, at fólkið má drekka. Og Móses so gjørdi í eygsjónini á teimum elstu av Ísrael.

7 Og hann kallaði navnið á plássinum Măs-sâh, og Mêr-î-bâh, uppá grund av skeldingini av Ísraels børnum, og av tí at teir freistaðu HARRAN, sigandi, Er HARRIN okkara millum, ella ikki?

8 ¶ Tá kom Ā-mâ-lēk, og bardist við Ísrael í Rēph-ĭ-dĭm.

9 Og Móses segði við Josjua, Vel okkum út menn, og far út, berst við Ā-mâ-lēk: í morgin vil eg standa á toppinum av heygnum við stavi Guðs í míni hond.

10 So Josjua gjørdi sum Móses hevði sagt til hansara, og bardist við Ā-mâ-lēk: og Móses, Aaron, og Hūr fóru niðan til toppin av heygnum.

11 Og tað bar á, tá ið Móses helt uppi síni hond, at Ísrael hevði yvirvág: og tá ið hann læt niður sína hond, hevði Ā-mâ-lēk yvirvág.

12 Men Móse hendur *vóru* tungar; og teir tóku ein stein, og settu *hann* undir hann, og hann sat hará; og Aaron og Hūr studdu uppi hondum hansara, tann ēini á tí ēinu síðuni, og hīn á hīnari síðuni; og hansara hendur vórðu støðugar inntil niðurfaring sólarinnar.

13 Og Josjua avhólvaði Ā-mâ-lēk og hansara fólk við svørðseggini.

14 Og HARRIN segði við Móses, Skriva hetta *til* eitt minni í eina bók, og far yvir *tað* aftur í oyruni á Josjua: tí at eg vil fullkomiliga strúka út minnið um Ā-mâ-lēk undan himni.

15 Og Móses bygdi eitt altar, og kallaði navnið á tí Jē-hō-văh-nīs-sī:

16 Tí at hann segði, Av tí at HARRIN hevur svorið, *at* HARRIN *vil hava* kríggj við Ā-mâ-lēk frá ætt til ætt.

KAPITUL 18

TÁ ið Jēth-rô, prestur Mī-dī-ăn-s, verfaðir Mósesar, hoyrdi um alt sum Guð hevði gjørt fyri Móses, og fyri Ísrael sítt fólk, *og* at HARRIN hevði ført Ísrael út úr Egyptalandi;

2 Tá tók Jēth-rô, verfaðir Mósesar, Zĭp-pō-rūh, konu Mósesar, eftir *at* hann hevði sent hana aftur,

3 Og hennara tveir synir; av hvørjum navnið hjá tí ēina *var* Gĕr-sjŏm; tí at hann segði, Eg havi verið ein ókunnumaður í einum fremmandum landi:

4 Og navnið hjá hīnum *var* Êl-ĭ-ē-zĕr; tí at Guð faðirs míns, *segði hann, var* hjálp mín, og bjargaði mær frá svørði Pharaohs:

5 Og Jēth-rô, verfaðir Mósesar, kom við sonum hansara og konu hansara at Mósesi inn í oyðuna, har hann leiraðist við fjall Guðs:

6 Og hann segði við Móses, Eg, verfaðir tín Jēth-rô, eri komin til tín, og kona tín, og hennara tveir synir við henni.

7 ¶ Og Móses fór út at møta verfaðir sínum, og inti heiðurslútan, og kysti hann; og teir spurdu hvør annan um *teirra* trivnað; og teir komu inn í tjaldið.

8 Og Móses taldi verfaðir sínum alt sum HARRIN hevði gjørt innat Pharaoh og við Egyptarnar fyri Ísraels skuld, *og* alt strevið sum var komið uppá teir eftir vegnum, og *hvussu* HARRIN útfríaði teir.

9 Og Jĕth´-rô fegnaðist yvir alla ta góðsku sum HARRIN hevði gjørt við Ísrael, hvønn hann hevði útfríað út úr hondini á Egyptunum.

10 Og Jĕth´-rô segði, Signaður *veri* HARRIN, sum hevur útfríað tykkum út úr hondini á Egyptunum, og út úr hondini á Pharaoh, sum hevur útfríað fólkið frá *at vera* undir hondini á Egyptunum.

11 Nú veit eg, at HARRIN *er* størri enn allir gudar: tí at í tí tingi, í hvørjum teir handlaðu hugmóðiga, *var hann* omanfyri teir.

12 Og Jĕth´-rô, verfaðir Mósesar, tók eitt brennioffur og sláturoffur˘ til Guðs: og Aaron kom, og allir teir elstu av Ísrael, at eta breyð við verfaðir Mósesar frammi fyri Guði.

13 ¶ Og tað bar á um morgisárið, at Móses settist at døma fólkið: og fólkið stóð hjá Mósesi frá morgninum at kvøldinum.

14 Og tá ið verfaðir Mósesar sá alt sum hann gjørdi við fólkið, segði hann, Hvat *er* hetta tingið sum tú gert við fólkið? hví siturt tú sjálvur einsamallur, og alt fólkið stendur hjá tær frá morgni at kvøldi?

15 Og Móses segði við verfaðir sín, Av tí at fólkini koma til mín at fregnast av Guði:

16 Tá ið teir hava eitt mál, koma teir til mín; og eg dømi ímillum ēin og ein annan, og eg fái *teir at* kenna Guðs ásetingar, og hansara lógir.

17 Og verfaðir Mósesar segði við hann, Tað ting, sum tú gert, *er* ikki gott.

18 Tú vilt vissuliga slítast út, bæði tú, og hetta fólk sum hjá tær *er:* tí at hetta tingið *er* ov tungt hjá tær; tú ert ikki førur fyri at útinna tað sjálvur aleinaur.

19 Lýð nú á mína rødd, eg vil geva tær ráð, og Guð skal vera við tær: Vert tú fyri fólkið mótvegis Guði, at tú mást føra søkirnar til Guðs:

20 Og tú skalt læra teir reglurskipanir og lógir, og skalt sýna teim vegin, í hvørjum teir mugu ganga, og tað verk sum teir mugu gera.

21 Haraftrat skalt tú skaffa burtur úr øllum fólkinum førar menn, slíkar sum óttast Guð, sannleiks-menn, hatandi havisjúku, og set *slíkar* yvir teimum, *til at vera* stjórnarar hjá túsundum, *og* stjórnarar hjá hundraðum, stjórnarar hjá fimtium, og stjórnarar hjá tíggjum:

22 Og lat teir døma fólkið til allar tíðir: og tað skal verða, *at* hvørt stórt mál skulu teir føra til tín, men hvørt lítið mál skulu teir døma: so skal tað verða lættari hjá tær sjálvum, og teir skulu bera *byrðina* við tær.

23 Um tú skalt gera henda lut, og Guð ábjóði tær *so,* tá skalt tú vera førur fyri at halda út, og alt hetta fólk skal eisini fara til pláss síns í friði.

24 So Móses lýddi á rødd verfaðirs síns, og gjørdi alt sum hann hevði sagt.

25 Og Móses valdi førar menn burtur úr øllum Ísrael, og gjørdi teir *til* høvd˘ yvir fólkinum, stjórnarar hjá túsundum, stjórnarar hjá hundraðum, stjórnarar hjá fimtium, og stjórnarar hjá tíggjum.

26 Og teir dømdu fólkið til allar tíðir: tey torføru málini fordu teir til Mósesar, men hvørt lítið mál dømdu teir sjálvir.

27 ¶ Og Móses læt verfaðir sín fara avstað; og hann fór sín veg inn í egna land sítt.

KAPITUL 19

Í HINUM triðja mánaði, tá ið Ísraels børn vóru farnir fram út úr Egyptalandi, hin sama dag komu teir *inn í* Sí-naí-s oyðu.

2 Tí at teir vóru farnir avstað frá Rêph-i-dim, og vóru komnir *til* oyðimarkar Sí-naí-s, og høvdu sligið upp í oyðuni; og har leiraðist Ísrael frammanfyri fjallið.

3 Og Móses fór niðan til Guðs, og HARRIN kallaði á hann út av fjallinum, sigandi, Svá skalt tú siga til Jákobs húss, og siga børnum Ísraels;

4 Tit hava sæð hvat eg gjørdi Egyptunum, og *hvussu* eg bar tykkum á arnaveingjum, og førdi tykkum at mær sjálvum.

5 Nú tessvegna, um tit vilji lýða mína rødd í roynd *og veru*, og halda mín sáttmála, so skulu tit vera mær ein seregin dýrgripur uppum øll fólk: tí at øll jørðin *er* mín:

6 Og tit skulu vera mær eitt kongadømi av prestum, og ein heilag tjóð. Hesi *eru* orðini sum tú skalt tala við børn Ísraels.

7 ¶ Og Móses kom og rópaði á hinar elstu fólksins, og legði framfyri teirra andlit˘ øll hesi orð sum HARRIN bjóðaði honum.

8 Og alt fólkið svaraði tilsaman, og segði, Alt, sum HARRIN hevur talað, vilja vit gera. Og Móses bar aftur orðini hjá fólkinum at HARRANUM.

9 Og HARRIN segði við Móses, Sí, eg komi at tær í einum tjúkkum skýggi, at fólkið má hoyra tá ið eg tali við teg, og trúgva tær um ævir. Og Móses segði orðini hjá fólkinum at HARRANUM.

10 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Far at fólkinum, og halga tey í dag og í morgin, og lat tey tváa klæðir síni,

11 Og vera tilreiðar ímóti hinum triðja degi: tí at hin triðja dagin vil HARRIN koma niður í eygsjónini hjá øllum fólkinum uppá Sí-naí fjall.

12 Og tú skalt seta fólkinum greinsur runt umkring, sigandi, Gevið gætur um tykkum sjálvar, *at tit* fari *ikki* niðan á fjallið, ella nemi við markið av tí: hvørsumhelst *ið* nemur við fjallið, skal vissuligani verða tikin av lívi:

13 Tað skal ikki ein hond nema við tað, men hann skal vissuligani verða steinaður, ella skotin ígjøgn; hvørt *tað veri seg* djór ella maður, tað skal ikki liva: tá ið lúðurin ljóðar leingi, skulu teir koma upp til fjallsins.

14 ¶ Og Móses fór oman frá fjallinum at fólkinum, og halgaði fólkið; og tey tvógu klæðir síni.

15 Og hann segði við fólkið, Verið tilreiðar ímóti hinum triðja degi: komið ikki at *tykkara* konum.

16 ¶ Og tað hendi á hinum triðja degi um morgunin, at tað vóru torusláttir og snarljós˘, og eitt tjúkt skýggj uppiá fjallinum, og røddin av einum lúðri avbera hørdum; so at alt fólkið, sum *var* í leirinum, nøtraði.

17 Og Móses førdi fram fólkið út úr leirinum at møtast við Guði; og tey stóðu við hin niðara partin av fjallinum.

18 Og Sí-naí fjall var aldeilis á einum royki, av tí at HARRIN steig niður uppá tað í eldi: og roykurin harav steig upp sum roykurin av einum bræðsluovni, og alt fjallið skalv stórligani.

19 Og tá ið røddin av lúðrinum ljóðaði leingi, og vaks harðari og harðari, talaði Móses, og Guð svaraði honum við^ eini rødd.

20 Og HARRIN kom niður uppá Sí-naí fjall, á toppin av fjallinum: og HARRIN kallaði Móses *niðan* til toppin á fjallinum; og Móses fór niðan.

21 Og HARRIN segði við Móses, Far oman, álegg fólkinum, at ikki teir bróti ígjøgn at HARRANUM at stara, og mangir av teim týnist.

22 Og lat prestarnar eisini, sum koma nær til HARRANS, halga seg sjálvar, at ikki HARRIN bróti fram uppá teir.

23 Og Móses segði við HARRAN, Fólkið kann ikki koma upp til Sï´-naî fjalls: tí at tú álegðirt oss, sigandi, Setið greinsur um fjallið, og halgið tað.

24 Og HARRIN segði við hann, Avstað, slepp tær oman, og tú skalt koma niðan, tú, og Aaron við tær: men lat ikki prestarnar og fólkið bróta ígjøgn til at koma niðan at HARRANUM, at ikki hann bróti fram uppá teir.

25 Og Móses fór oman at fólkinum, og talaði við teir.

KAPITUL 20

OG Guð talaði øll hesi orðini, sigandi,

2 Eg *eri* HARRIN Guð tín, sum havi ført teg út úr Egyptalandi, út úr trældóms-húsinum.

3 Tú skalt ongar aðrar gudar hava undan mær.

4 Tú skalt ikki gera tær nakra rista mynd, ella nakran líkleika *av nøkrum tingi* sum *er* í himni fyri oman, ella sum *er* á jørðini fyri niðan, ella sum *er* í vatninum undir jørðini:

5 Tú skalt ikki boyggja niður teg sjálvan fyri teimum, ella tæna teimum: tí at eg, HARRIN Guð tín, *eri* ein ástbrellin Guð, heimsøkjandi misgerð fedranna omanyvir børnini at hinum triðja og fjórða *ættarliði* hjá teimum sum hata meg;

6 Og sýnandi miskunn at túsundum av teimum sum elska meg, og halda boðini hjá mær.

7 Tú skalt ikki taka navn HARRANS Guðs tíns í fáfongd; tí at HARRIN vil ikki halda hann sakleysan, sum tekur navn hans í fáfongd.

8 Minst til sabbatsdagin, at halda hann heilagan.

9 Seks dagar skalt tú streva, og gera alt títt arbeiði:

10 Men hin sjeyndi dagurin *er* sabbatur HARRANS Guðs tíns: *í honum* skalt tú ikki gera nakað arbeiði, tú, ella sonur tín, ella dóttir tín, tænastusveinur tín, ella tænastugenta tín, ella fenaður tín, ella tín fremmandi sum *er* innan portra tína:

11 Tí at *á* seks døgum gjørdi HARRIN himin og jørð, sjógvin, og alt sum í teim *er,* og hvíldi hin sjeynda dagin: hvørsvegna HARRIN vælsignaði sabbatsdagin, og halgaði hann.

12 ¶ Æra faðir tín og móður tína: at tínir dagar mega verða langir uppiá landinum sum HARRIN Guð tín gevur tær.

13 Tú skalt ikki drepa.

14 Tú skalt ikki fremja hordóm.

15 Tú skalt ikki stjala.

16 Tú skalt ikki bera falskan vitnisburð ímóti næsta tínum.

17 Tú skalt ikki girnast hús næsta tíns, tú skalt ikki girnast konu næsta tíns, ella tænastusvein hans, ella tænastugentu hans, ella oksa hans, ella asna hans, ella nakað ting sum næsta tíns *er.*

18 ¶ Og alt fólkið sá torusláttirnar, og snarljósini, og ljóðið av lúðrinum, og fjallið rúkandi: og tá ið fólkið sá *tað,* fluttu tey *seg burtur,* og stóðu langt burturifrá.

19 Og teir søgdu við Móses, Tala tú við okkum, og vit vilja hoyra: men lat ikki Guð tala við okkum, at ikki vit doyggi.

20 Og Móses segði við fólkið, Óttist ikki: tí at Guð er komin at royna tykkum, og at ótti hansara má vera frammi fyri andlitum tykkara, at tit syndi ikki.

21 Og fólkið stóð langt burturifrá, og Móses dró nær at tí tjúkka myrkrinum, har Guð *var*.
22 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Svá skalt tú siga við Ísraels børn, Tit hava sæð, at eg havi talað við tykkum frá himni.
23 Tit skulu ikki gera hjá mær gudar av silvuri, eiheldur skulu tit gera tykkum gudar av gulli.
24 ¶ Eitt altar av jørð skalt tú gera mær, og skalt sláturofra harátíni brennioffur, og tíni friðoffur, tínar seyðir, og tínar oksar: á øllum støðum, har eg skráseti mítt navn, vil eg koma til tín, og eg vil vælsigna teg.
25 Og um tú vilt gera mær eitt altar av steini, skalt tú ikki byggja tað av høgdum steini: tí at um tú lyfti upp títt amboð uppá tað, hevurt tú óreinkað tað.
26 Eiheldur skalt tú fara upp eftir trappum at altari mínum, at tín nakni verði ikki avdúkað hará.

KAPITUL 21

NÚ, hesir *eru* dómarnir sum tú skalt seta framfyri teir.
2 Um tú keypi ein Hebrāiskan tænara, seks ár skal hann tæna: og í hinum sjeynda skal hann fara út fríur fyri einkið.
3 Um hann kom inn fyri seg sjálvan, skal hann fara út fyri seg sjálvan: um hann var giftur, so skal kona hansara fara út við honum.
4 Um hansara meistari havi givið honum konu, og hon havi føtt honum synir ella døtur; konan og hennara børn skulu vera meistara hennara, og hann skal fara út fyri seg sjálvan.
5 Og um tænarin skal týðiliga siga, Eg elski meistara mín, konu mína, og børn míni; eg vil ikki fara út fríur:
6 So skal hansara meistari føra hann at dómarunum; hann skal eisini føra hann til hurðina ella at durastavinum; og hansara meistari skal bora hans oyra ígjøgn við eini sýl; og hann skal tæna honum um ævir.
7 ¶ Og um ein maður selji sína dóttur til at vera ein tænastugenta, hon skal ei fara út eins og tænastusveinarnir gera.
8 Um hon tokni ikki meistara sínum, sum hevur trúlovað hana til sín sjálvs, so skal hann lata hana verða endurloysta: at selja hana at eini ókunnugari tjóð skal hann ongan mátt hava, eftirsum *at* hann hevur farið svikaligani við henni.
9 Og um hann havi trúlovað hana syni sínum, skal hann fara við henni eftir háttarlagi døtra.
10 Um hann taki sær eina aðra *konu;* hennara mat, hennara klædnað, og hennara hjúnalagsskyldu, skal hann ikki minka *um*.
11 Og um hann geri ikki hesi trý at henni, so skal hon fara út frí uttan pening.
12 ¶ Hann sum slær ein mann, so at hann doyggi, skal vissuligani verða tikin av lívi.
13 Og um ein maður liggi ikki á lúri, men Guð gevi *hann* upp í hans hond; so vil eg útnevna tær eitt pláss, hvagar hann skal flýggja.
14 Men um ein maður komi framførnisligani uppá sín næsta, til at vega hann við sviki; tú skalt taka hann frá mínum altari, at hann má doyggja.
15 ¶ Og hann sum slær faðir sín, ella móður sína, skal vissuligani verða tikin av lívi.
16 ¶ Og hann sum stjelur ein mann, og selur hann, ella um hann verði funnin í hond hans, hann skal vissuligani verða tikin av lívi.
17 ¶ Og hann sum bannar faðir sín, ella móður sína, skal vissuligani verða tikin av lívi.

18 ¶ Og um menn stríði saman, og ēin slái annan við einum steini, ella við *sínum* neva, og hann doyggi ei, men passar song *sína:*

19 Um hann rísi aftur, og gangi útium uppiá sínum stavi, so skal hann, sum sló *hann,* vera leysur: einans *at* hann skal gjalda *fyri* missin av hansara tíð, og skal elva *honum* at verða grundigani grøddur.

20 ¶ Og um ein maður slái sín tænara, ella sína ternu, við einum stavi, og hann doyggi undir hond hans; hann skal vissuligani verða revsaður.

21 Hóast tað, um hann haldi áfram ein dag ella tveir, skal hann ei verða revsaður: tí at hann *er* sín peningur.

22 ¶ Um menn stríði, og meiði eina konu við barn, so at hennara ávøkstur víki *frá henni,* og tó einkið mein fylgi: hann skal vissuligani verða revsaður, samsvarandi sum ektamaðurin hjá kvinnuni vil leggja uppá hann; og hann skal gjalda sum dómararnir *avgera.*

23 Og um *nakað* mein fylgi, so skalt tú geva lív fyri lív,

24 Eyga fyri eyga, tonn fyri tonn, hond fyri hond, fót fyri fót,

25 Bruna fyri bruna, sár fyri sár, skeinu fyri skeinu.

26 ¶ Og um ein maður slái eyga tænara síns, ella eyga ternu sínar, at tað farist; hann skal lata hann fara frían fyri eyga hansara skuld.

27 Og um hann slái út tonn tænastusveins síns, ella tonn tænastugentu sínar; hann skal lata hann fara frían fyri tannar hansara skuld.

28 ¶ Um ein oksi stangi ein mann ella eina kvinnu, at tey doyggi: so skal oksin vissuligani verða steinaður, og hansara kjøt skal ei verða etið; men eigarin av oksanum *skal vera* leysur.

29 Men um oksin var vanur at trýsta við sínum horni í lidnari tíð, og tað hevur verðið vitnað fyri eigara hansara, og hann hevur ikki hildið hann inni, men at hann hevur dripið ein mann ella eina kvinnu; oksin skal verða steinaður, og hans eigari eisini skal verða tikin av lívi.

30 Um tað verði lagt á hann ein upphædd av peningi, so skal hann geva fyri loysigjaldið av sínum lívi hvatsumhelst *ið* lagt verður uppá hann.

31 Hvørt hann havi stangað ein son, ella havi stangað eina dóttur, samsvarandi við hansara dóm skal tað verða gjørt at honum.

32 Um oksin skal trýsta ein tænastusvein ella eina tænastugentu; *so* skal hann geva teirra meistara tríati sjē´-kl-ar av silvuri, og oksin skal verða steinaður.

33 ¶ Og um ein maður skal opna eina holu, ella um ein maður skal grava eina holu, og ikki dekka hana, og ein oksi ella ein asni detti harí;

34 Eigarin av holuni skal gera *tað* gott, *og* geva pening at eigara teirra; og tað deyða *djórið* skal vera hansara.

35 ¶ Og um oksin hjá ēinum manni skaði ein annans, at hann doyggi; tá skulu teir selja hin livandi oksan, og býta peningin av honum; og hin deyða *oksan* eisini skulu teir býta.

36 Ella um tað veri vitað, at oksin hevur plagað at trýst í lidnari tíð, og hans eigari hevur ikki hildið hann inni; hann skal vissuliga gjalda oksa fyri oksa; og hin deyði skal vera hans egni.

KAPITUL 22

UM ein maður skal stjala ein oksa, ella ein seyð, og drepa hann, ella selja hann; hann skal endurbøta fimm oksar fyri ein oksa, og fýra seyðir fyri ein seyð.

2 ¶ Um ein tjóvur verði funnin brótandi inn, og verði sligin, at hann doyggi, *tað skal* einkið blóð *verða úthelt* fyri hann.

3 Um sólin veri risin uppá hann, *skal* blóð *verða úthelt* fyri hann; *tí at* hann skuldi framt fulla endurbering; um hann einkið havi, tá skal hann verða seldur fyri tjóvarí sítt.

4 Um tjóvagóðsið verði vissuligani funnið í hond hans á lívi, hvørt tað veri *seg* oksi, ella asni, ella seyður; hann skal endurbøta tvífalt.

5 ¶ Um ein maður skal elva einum akri ella einum víngarði at verða etnum, og skal seta inn djór sítt, og skal *hava* á biti á annars mans akri; av tí besta av sínum egna akri, og av tí besta av sínum egna víngarði, skal hann gera endurbøting.

6 ¶ Um eldur bróti út, og festi í tornir, so at bundini av korni, ella tað standandi kornið, ella akurin, verði upptærd *harvið;* hann, sum kyndi eldin, skal vissuligani gera endurbøting.

7 ¶ Um ein maður skal flýggja næsta sínum pening ella ting at varðveita, og tað verði stjolið úr húsi mansins; um tjóvurin verði funnin, lat hann gjalda tvífalt.

8 Um tjóvurin verði ikki funnin, tá skal meistarin av húsinum verða førdur at dómarunum, *til tess at sjá* hvørt hann havi lagt sína hond at góðsinum hjá næsta sínum.

9 Fyri alt háttarlag av misgerð, *hvørt tað veri* fyri oksa, ella asna, fyri seyð, fyri klædnað, *ella* fyri nakað háttarlag av mistum tingi, sum *ein annar* avbjóðar at vera hansara, skal søkin hjá báðum flokkum koma framfyri dómararnar; *og* hvønn *ið* dómararnir skulu fordøma, hann skal gjalda tvífalt at næsta sínum.

10 Um ein maður flýggi sínum næsta ein asna, ella ein oksa, ella ein seyð, ella nakað djór, til *tess* at varðveita; og tað doyggi, ella verði skatt, ella rikið burtur, eingin maður síggjandi *tað:*

11 *Tá* skal ein eiður HARRANS vera ímillum teir báðar, at hann hevur ikki lagt sína hond at góðsi næsta síns; og eigarin av tí skal góðtaka *harav,* og hann skal ikki gera *tað* gott.

12 Og um tað verði *seg* stjolið frá honum, *tá* skal hann gera endurbøting at tess eigara.

13 Um tað verði skrætt í stykkir, *tá* lat hann føra tað *sum* vitni; *og* hann skal ikki gera gott tað sum varð skrætt.

14 ¶ Og um ein maður læni *okkurt* av næsta sínum, og tað verði skatt, ella doyggi, tess eigari ei *verandi* hjá tí, hann skal vissuliga gera *tað* gott.

15 *Men* um tess eigari *veri seg* hjá tí, skal hann ei gera *tað* gott: um tað *veri* eitt leigað *ting,* kom tað fyri hansara leigu.

16 ¶ Og um ein maður lokki eina moyggj sum er ikki trúlovað, og liggi við henni, hann skal vissuliga brúðargjalda hana til at verða kona hansara.

17 Um hennara faðir aldeilis sýti at geva honum hana, skal hann gjalda pening samsvarandi við brúðargjald jomfrúgva.

18 ¶ Tú skalt ikki loyva eini heks at liva.

19 ¶ Hvørsumhelst *ið* liggur við einum djóri, skal vissuligani verða tikin av lívi.

20 ¶ Hann sum sláturofrar *nøkrum* gudi, uttan HARRANUM einans, hann skal verða aldeilis oyddur.

21 ¶ Tú skalt hvørki plága ein fremmandan, ella kúga hann: tí at tit vóru fremmandir í Egyptalandi.

22 ¶ Tit skulu ikki níva nakra einkju, ella faðirleyst barn.

23 Um tú nívi tey á nakran vís, og tey rópi yvirhøvur á meg, eg vil vissuliga hoyra teirra róp;
24 Og mín vreiði skal vaksa heit, og eg vil drepa tykkum við svørðinum; og tykkara konur skulu verða einkjur, og tykkara børn faðirleys.
25 ¶ Um tú læni pening til *nakran av* mínum fólki *sum er* fátækur hjá tær, tú skalt ikki vera fyri honum sum ein okrari, eiheldur skalt tú leggja uppá hann okur.
26 Um tú yvirhøvur taki næsta tíns klædnað til pant, skalt tú lata honum hann áðrenn ið sólin fer niður:
27 Tí at tað *er* hansara dekking einans, tað *er* hansara klædnaður til húð hansara: hvarí skal hann sova? og tað skal bera á, tá ið hann rópar á meg, at eg vil hoyra; tí at eg *eri* náðisamur.
28 ¶ Tú skalt ikki útspilla gudarnar, ella bølbiðja stjórnara fólks tíns.
29 ¶ Tú skalt ikki fresta *at ofra* tað fyrsta av tínum stadnu fruktum, og av vínvætum tínum: hin frumborna av sonum tínum skalt tú geva mær.
30 Somuleiðis skalt tú gera við oksar tínar, *og* við seyð tín: sjey dagar skal tað vera hjá mammu síni; á hinum áttanda degi skalt tú geva tað mær.
31 ¶ Og tit skulu vera heilagir menn at mær: eiheldur skulu tit eta *nakað* kjøt *sum er* skrætt av djórum á akrinum; tit skulu kasta tað til hundarnar.

KAPITUL 23

TÚ skalt ikki reisa eitt falskt ummæli: set ei tína hond við tí vonda til at vera eitt órættvíst vitni.
2 ¶ Tú skalt ikki fylgja eini fjøld til at *gera* ilt; eiheldur skalt tú tala í eini søk til at halda undan eftir mongum at avlaga *dóm:*
3 ¶ Eiheldur skalt tú ásjóna ein fátækan mann í hansara søk.
4 ¶ Um tú møti oksanum hjá tínum fíggindga, ella hans asna, farandi á strok, tú skalt vissuliga føra hann aftur til hansara aftur.
5 Um tú síggi asna hansara sum hatar teg, liggjandi undir síni byrði, og vildirt latið vera við at hjálpa honum, tú skalt vissuliga hjálpa við honum.
6 Tú skalt ikki avlaga dómin hjá tínum fátæka í hansara søk.
7 Halt teg langt frá einum følskum máli; og tí óseka og rættvísa bana tú ikki: tí at eg vil ikki rættvísgera hin vonda.
8 ¶ Og tú skalt onga gávu taka: tí at gávan blindar hin vísa, og spillir orðini hjá teimum rættvísu.
9 ¶ Eisini tú skalt ikki kúga ein fremmandan: tí at tit kenna hjartað hjá einum fremmandum, við tað at tit vóru fremmandir í Egyptalandi.
10 Og seks ár skalt tú sáa jørð tína, og skalt savna inn ávøkstir hennara:
11 Men tað sjeynda *árið* skalt tú lata hana hvíla og liggja stilla; at hinir fátøku fólks tíns mega eta: og tað, *sum* teir lata eftir, skulu markarinnar djór eta. Á líkan hátt skalt tú fara við víngarði tínum, *og* við olivingarði tínum.
12 Seks dagar skalt tú gera títt arbeiði, og á hinum sjeynda degi skalt tú hvíla: at tín oksi og tín asni mega hvíla, og sonurin at tíni tænastugentu, og hin fremmandi, mega verða endurfrískaði.
13 Og í øllum *tingum* sum eg havi sagt við tykkum, verið eftiransnir: og inn onga nevning av navni annara guda, eiheldur lat tað verða hoyrt út úr munni tínum.
14 ¶ Tríggjar ferðir skalt tú halda hátíð at mær í árinum.
15 Tú skalt halda hátíð ósúrgaðs breyðs: (tú skalt eta ósúrgað breyð sjey dagar, eins og eg ábeyð

tær, í tí ásettu tíðini av Ábib mánaði; tí at í honum komst tú út frá Egyptalandi: og eingin skal birtast frammi fyri mær tóm*hent*ur:)

16 Og heysts-hátíðina, frumávøkstirnir av tínum strevum, sum tú hevurt sáað í akurin: og innsavningar-hátíðina, *sum er* við enda ársins, tá ið tú hevurt savnað inn tíni strev uttan av akrinum.

17 Tríggjar ferðir um árið skulu allir tínir hannar birtast frammi fyri Harranum GUÐI.

18 Tú skalt ikki ofra blóðið av mínum sláturofri við súrgaðum breyði; eiheldur skal feittið av mínum sláturofri verða verandi inntil morgunin.

19 Tað fyrsta av frumávøkstum lands tíns skalt tú føra inn í hús HARRANS Guðs tíns. Tú skalt ikki sjóða eitt geitarlamb í mjólk móður hans.

20 ¶ Sí, eg sendi ein Eingil undan tær, til at varðveita teg á veginum, og at føra teg inn í staðið sum eg havi fyribúgvið.

21 Ver varin fyri honum, og lýð rødd hansara, tirra hann ei; tí at hann vil ikki umbera tykkara misgerðir: tí at navn mítt *er* í honum.

22 Men um tú skalt veruliga lýða rødd hansara, og gera alt sum eg tali; so vil eg vera ein fíggindi yvirfyri fíggindum tínum, og ein mótstandari yvirfyri mótstandarum tínum.

23 Tí at mín Eingil skal fara undan tær, og føra teg inn at Amoritunum, og Hittitunum, og Pê-rīz-zīt´-unum, og Cānaanitunum, *og* Hī-vīt´-unum, og Jēb-ū-sīt´-unum: og eg vil skera teir av.

24 Tú skalt ikki lúta niður fyri teirra gudum, ella tæna teimum, ella gera eftir verkum teirra: men tú skalt fullkomiliga kollrenna teir, og heilt bróta niður teirra myndir.

25 Og tit skulu tæna HARRANUM Guði tykkara, og hann skal vælsigna breyð títt, og vatn títt; og eg vil taka sjúkdóm burtur frá miðjum tær.

26 ¶ Tað skal einkið kasta síni smáu, ella vera óburið, í landi tínum: eg vil uppfylla tal daga tína.

27 Eg vil senda mín ótta undan tær, og vil oyða øll fólkini, til hvørja tú skalt koma, og eg vil fáa allar tínar figgindar *at* venda sínar ryggir at tær.

28 Og eg vil senda eiturvespur undan tær, sum skulu reka út Hī-vīt´-an, Cānaanitan, Hittitan, frammanfyri tær ífrá.

29 Eg vil ikki reka teir út frammanfyri tær ífrá í ēinum ári; at ikki landið gerist oyði, og markarinnar villdjór margfaldist ímóti tær.

30 Eftir smáum og smáum vil eg reka teir út frammanfyri tær ífrá, inntil tú verði øktur, og arvi landið.

31 Og eg vil seta tínar greinsur frá Reyða-havinum alt at havi Philistanna, og frá oyðimørkini at ánni: tí at eg vil geva upp íbúgvar landsins inn í hond tykkara; og tú skalt reka teir út frammanfyri tær.

32 Tú skalt ongan sáttmála gera við teir, ella við teirra gudar.

33 Teir skulu ikki búgva í landi tínum, at ikki teir fái teg *at* synda ímóti mær: tí at um tú tæni teirra gudum, tað skal vissuliga vera ein snerra at tær.

KAPITUL 24

OG hann segði við Móses, Kom niðan at HARRANUM, tú, og Aaron, Nádab, og Ā´-bī-hû, og sjeyti av hinum elstu av Ísrael; og tilbiðjið tit langt burturifrá.

2 Og Móses einsamallur skal koma nær HARRANUM: men teir skulu ikki koma í nánd; eiheldur skal fólkið fara niðan við teimum.

3 ¶ Og Móses kom og taldi fólkinum øll orðini hjá HARRANUM, og allar dómarnar: og alt fólkið svaraði við einari rødd, og segði, Øll orðini, sum HARRIN hevur sagt, vilja vit gera.

4 Og Móses skrivaði øll orðini hjá HARRANUM, og reis upp árla um morgunin, og bygdi eitt altar undir heygnum, og tólv stólpar, samsvarandi við hinar tólv ættargreinir Ísraels.

5 Og hann sendi ungar menn av børnum Ísraels, sum ofraðu brennioffur˘, og sláturofraðu friðoffur˘ av oksum at HARRANUM.

6 Og Móses tók helmingin av blóðinum, og setti *tað* í kør; og helmingin av blóðinum sletti hann á altarið.

7 Og hann tók bók sáttmálans, og las í áhoyrn fólksins: og teir søgdu, Alt, sum HARRIN hevur sagt, vilja vit gera, og vera lýdnir.

8 Og Móses tók blóðið, og rýddi *tað* á fólkið, og segði, Sí blóð sáttmálans, sum HARRIN hevur gjørt við tykkum viðvíkjandi øllum hesum orðum.

9 ¶ Tá fóru niðan Móses, og Aaron, Nádab, og Ā˙bī-hû, og sjeyti av hinum elstu av Ísrael:

10 Og teir sóu Guð Ísraels: og *har var* undir hansara fótum sum var tað eitt steinsett verk av einum sapphīr steini, og sum var tað himins likamið í *sínum* klárleika.

11 Og uppá aðalsmenninar av Ísraels børnum legði hann ikki hond sína: teir eisini sóu Guð, og ótu og drukku.

12 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Kom niðan til mín á fjallið, og verð har: og eg vil geva tær talvur av steini, og lógina, og boð˘ sum eg havi skrivað; at tú mást frálæra tey.

13 Og Móses reis upp, og hansara tænari Josjua: og Móses fór niðan á fjall Guðs.

14 Og hann segði við hinar elstu, Bíðið tit her eftir okkum, inntil vit koma aftur at tykkum: og sí, Aaron og Hūr *eru* hjá tykkum: um nakar maður havi nøkur mál at inna, lat hann koma at teimum.

15 Og Móses fór niðan á fjallið, og eitt skýggj huldi fjallið.

16 Og HARRANS dýrd dvaldi uppiá Sī˙nāi fjalli, og skýggið huldi tað seks dagar: og hin sjeynda dagin kallaði hann á Móses út úr miðjum skýgginum.

17 Og ásýndin á dýrd HARRANS *var* líka *sum* uppslúkandi eldur á toppinum av fjallinum í eygsjón Ísraels barna.

18 Og Móses fór inn í miðjuna av skýgginum, og slapp sær niðan á fjallið: og Móses var á fjallinum fjøruti dagar og fjøruti nætur.

KAPITUL 25

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við børn Ísraels, at teir føri mær eitt offur: av hvørjum manni, sum gevur tað viljugani við sínum hjarta, skulu tit taka mítt offur.

3 Og hetta *er* ofrið sum tit skulu taka av teimum; gull, og silvur, og messing,

4 Og blátt, og purpur, og skarlaks*reytt,* og fínt lín, og geita*hár,*

5 Og veðraskinn litað reyð, og grevlingaskinn˘, og sjīt˙tīm við˙,

6 Olju til ljósið, kryddariir til salvingar-olju, og til søtt roykilsi,

7 Ónyks steinar, og steinar til at verða settir í ê-phōd˙-una, og í bringuskjøldurin.

8 Og lat teir gera mær ein halgidóm; at eg má dvøljast teirra millum.

9 Samsvarandi við alt sum eg sýni tær, *eftir* mynstrinum hjá tabernaklinum, og mynstrinum hjá øllum útbúnaðum tess, enntá soleiðis skulu tit gera *tað*.

10 ¶ Og teir skulu gera eina ørk *av* sjīt´-tīm viði: tvær alnir og hálv *skal vera* longdin hará, og ein alin og hálv breiddin hará, og ein alin og hálv hæddin hará.

11 Og tú skalt yvirklæða hana við skírum gulli, innan og uttan skalt tú yvirklæða hana, og skalt gera uppá hana eina krúnu av gulli runt umkring.

12 Og tú skalt stoypa fýra ringar av gulli til hennara, og seta *teir* í tey fýra hjørnini av henni; og tveir ringar *skulu vera* í tí ēinu síðuni av henni, og tveir ringar í hīnari síðuni av henni.

13 Og tú skalt gera stavir *av* sjīt´-tīm viði, og yvirklæða teir við gulli.

14 Og tú skalt seta stavirnar inn í ringarnar eftir síðunum av ørkini, at ørkin má verða borin við teimum.

15 Stavirnir skulu vera í ringum arkarinnar: teir skulu ikki verða tiknir frá henni.

16 Og tú skalt seta inn í ørkina vitnisburðin, sum eg skal geva tær.

17 Og tú skalt gera ein náðistól *av* skírum gulli: tvær alnir og hálv *skal vera* longdin hará, og ein alin og hálv breiddin hará.

18 Og tú skalt gera tveir chêr-û-bīm´-ar *av* gulli, *av* slignum verki skalt tú gera teir, í teir tveir endarnar av náðistólinum.

19 Og ger ēin cherub á tann ēina endan, og hīn cherubin á hīn endan: *enntá* av náðistólinum skulu tit gera chêr-û-bīm´-arnar á teir tveir endarnar hará.

20 Og chêr-û-bīm´-arnir skulu strekkja fram *sínar* veingir til hæddar, dekkandi náðistólin við veingjum sínum, og teirra andlit *skulu lita* hvørt móti øðrum; mótvegis náðistólinum skulu andlitini á chêr-û-bīm´-unum vera.

21 Og tú skalt seta náðistólin uppiyvir uppá ørkina; og í ørkina skalt tú seta vitnisburðin, sum eg skal geva tær.

22 Og har vil eg møtast við tær, og eg vil samtala við teg frá uppiyvir náðistólinum, frá ímillum teir tveir chêr-û-bīm´-arnar sum *eru* uppiá vitnisburðar-ørkini um øll *ting* sum eg vil geva tær í ábjóðing at Ísraels børnum.

23 ¶ Tú skalt eisini gera eitt borð *av* sjīt´-tīm viði: tvær alnir *skal vera* longdin hará, og ein alin breiddin hará, og ein alin og hálv hæddin hará.

24 Og tú skalt yvirklæða tað við skírum gulli, og gera til tað eina krúnu av gulli runt umkring.

25 Og tú skalt gera tí eina rond á eina hondbreidd runt umkring, og tú skalt gera eina gylta krúnu til rond tess runt umkring.

26 Og tú skalt gera til tað fýra ringar av gulli, og seta ringarnar í tey fýra hjørnini sum *eru* á teimum fýra beinum tess.

27 Yvir av bordanum skulu ringarnir vera til støð til stavirnar at bera borðið.

28 Og tú skalt gera stavirnar *av* sjīt´-tīm viði, og yvirklæða teir við gulli, at borðið má verða borið við teimum.

29 Og tú skalt gera føtini hjá tí, og sleivir*nar* hjá tí, og skeinkireiði*ni* hjá tí, og skálir*nar* hjá tí, til at skeinkja við: *av* skírum gulli skalt tú gera tey.

30 Og tú skalt seta uppá borðið sýnisbreyð frammi fyri mær alveg.

31 ¶ Og tú skalt gera ein kertastaka *av* skírum gulli: *av* slignum verki skal ljósastakin verða gjørdur: hansara skaft, og hansara greinar, hansara skálir, hansara knappar, og hansara blómur, skulu vera úr hinum sama.

32 Og seks greinar skulu koma út úr síðunum á honum; tríggjar

greinar á ljósastakanum út úr tí ēinu síðuni, og tríggjar greinar á ljósastakanum út úr hīnari síðuni:

33 Tríggjar skálir, gjørdar líkar mandlum, *við* einum knappi og eini blómu á ēinari grein; og tríggjar skálir, gjørdar líka *sum* mandlur, í hīnari greinini, *við* einum knappi og eini blómu: soleiðis á teimum seks greinunum sum koma út úr ljósastakanum.

34 Og á ljósastakanum *skulu vera* fýra skálir, gjørdar líkar mandlum, *við* knøppum sínum og blómum sínum.

35 Og *tað skal vera* ein knappur undir tveimum greinum av tí sama, og ein knappur undir tveimum greinum av tí sama, og ein knappur undir tveimum greinum av tí sama, samsvarandi við tær seks greinarnar sum útganga út úr ljósastakanum.

36 Teirra knappar og teirra greinar skulu vera av tí sama: alt tað *skal vera* ēitt sligið verk *av* skírum gulli.

37 Og tú skalt gera hinar sjey lampur hans: og tær skulu lýsna lampur hans, at tær mega geva ljós yvir av honum.

38 Og hansara *veik*tengur, og hansara skarpannur, *skulu vera av* skírum gulli.

39 *Úr* eini talent av skírum gulli skal hann gera hann, við øllum hesum reiðunum.

40 Og síggj *til,* at tú geri *tey* eftir teirra mynstri, sum varð sýnt tær á fjallinum.

KAPITUL 26

HARAFTRAT skalt tú gera tabernaklið *við* tíggju dúkum *av* fínum tvinnaðum líni; og bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum: við* chêr-û-bīm´-um av hegnigum verki skalt tú gera teir.

2 Longdin á ēinum dúki *skal vera* átta og tjúgu alnir, og breiddin á ēinum dúki fýra alnir: og hvør *og* ēin av dúkunum skal hava ēitt mát.

3 Teir fimm dúkarnir skulu verða koplaðir saman hvør til annan; og *aðrir* fimm dúkar *skulu verða* koplaðir hvør til annan.

4 Og tú skalt gera lykkjur av bláum uppá kantin á tí ēina dúkinum frá eggjarkantinum í koplingini; og somuleiðis skalt tú gera í tí ytsta kantinum á *einum øðrum* dúki, í koplingini á hinum øðrum.

5 Fimti lykkjur skalt tú gera í tí ēina dúkinum, og fimti lykkjur skalt tú gera í kantinum á dúkinum sum *er* í koplingini á hinum øðrum; at lykkjurnar mega taka hald hvør á aðrari.

6 Og tú skalt gera fimti krókar av gulli, og kopla dúkarnar saman við krókunum: og tað skal verða ēitt tabernakkul.

7 ¶ Og tú skalt gera dúkar *av* geita*hári* til at vera ein dekking uppiá tabernaklinum: ellivu dúkar skalt tú gera.

8 Longdin á ēinum dúki *skal vera* tríati alnir, og breiddin á ēinum dúki fýra alnir: og teir ellivu dúkarnir *skulu vera allir* av ēinum máti.

9 Og tú skalt kopla fimm dúkar fyri seg sjálvar, og seks dúkar fyri seg sjálvar, og skalt tvífalda hin sætta dúkin í frammistøðuni av tabernaklinum.

10 Og tú skalt gera fimti lykkjur á kantin á tí ēina dúkinum *sum er* uttast í koplingini, og fimti lykkjur á kantin á dúkinum sum koplar hin annan.

11 Og tú skalt gera fimti krókar av messing, og seta krókarnar inn í lykkjurnar, og kopla tjaldið saman, at tað má verða ēitt.

12 Og leivdin sum verður eftir av tjaldsdúkunum, tann hálvi dúkurin sum verður eftir, skal hanga yvir baksíðuna av tabernaklinum.

13 Og ein alin á tí ēinu síðuni, og ein alin á hīnari síðuni av tí sum verður eftir í longdini á tjaldsdúkunum, tað skal hanga yvir síðurnar av tabernaklinum hesumegin og hasumegin, til at dekka tað.

14 Og tú skalt gera eina dekking til tjaldið *av* veðraskinnum litaðum reyðum, og eina dekking uppiyvir *av* grevlingaskinnum.

15 ¶ Og tú skalt gera *tilju*borð˘ til tabernaklið *av* sjīt´-tīm viði, *sum* standa uppi.

16 Tiggju alnir *skal vera* longdin á einum borði, og ein alin og ein hálv *skal vera* breiddin á ēinum borði.

17 Tvær stellingar *skulu vera* í ēinum *tilju*borði, settar til rættis hvør ímóti aðrari: soleiðis skalt tú gera til øll borðini av tabernaklinum.

18 Og tú skalt gera borðini til tabernaklið, tjúgu borð á suður síðuni suðureftir.

19 Og tú skalt gera fjøruti soklar av silvuri undir tey tjúgu borðini; tveir soklar undir ēitt borð til tess tvær stellingar, og tveir soklar undir eitt annað borð til tess tvær stellingar.

20 Og til hina aðru síðuna av tabernaklinum á norður síðuni *skulu vera* tjúgu borð:

21 Og teirra fjøruti soklar *av* silvuri; tveir soklar undir ēinum borði, og tveir soklar undir einum øðrum borði.

22 Og til síðurnar av tabernaklinum vestureftir skalt tú gera seks borð.

23 Og tvey borð skalt tú gera til hjørnini av tabernaklinum í teimum tveimum síðunum.

24 Og tey skulu vera koplaði saman í neðra, og tey skulu vera koplaði saman uppiyvir høvdinum á tí at ēinum ringi: soleiðis skal tað vera fyri tey bæði; tey skulu vera til tey tvey hjørnini.

25 Og tey skulu vera átta borð, og teirra soklar *av* silvuri, sekstan soklar; tveir soklar undir ēinum borði, og tveir soklar undir einum øðrum borði.

26 ¶ Og tú skalt gera tvørtrø *av* sjīt´-tīm viði; fimm til *tilju*borðini á tí ēinu síðuni av tabernaklinum,

27 Og fimm tvørtrø til borðini á hīnari síðuni av tabernaklinum, og fimm tvørtrø til borðini á síðuni av tabernaklinum, til tær tvær síðurnar vestureftir.

28 Og mið-tvørtræið mitt á *tilju*borðunum skal røkka frá enda til enda.

29 Og tú skalt yvirklæða borðini við gulli, og gera teirra ringar *av* gulli *til* støð til tvørtrøini: og tú skalt yvirklæða tvørtrøini við gulli.

30 Og tú skalt reisa upp tabernaklið samsvarandi við snið tess sum varð sýnt tær á fjallinum.

31 ¶ Og tú skalt gera eitt forhang *av* bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum*, og fínum tvinnaðum líni av hegnigum verki: við ch*ê*r-*û*-bīm´-um skal tað verða gjørt:

32 Og tú skalt hanga tað uppá fýra stólpar av sjīt´-tīm *viði*, yvirklæddar við gulli: teirra krókar *skulu vera av* gulli, uppiá teimum fýra soklunum av silvuri.

33 ¶ Og tú skalt hanga upp forhangið undir krókarnar, at tú mást føra inn hagar, innum fortjaldið, vitnisburðar-ørkina: og forhangið skal atskilja hjá tykkum ímillum hitt heilaga *plássið* og tað mest heilaga.

34 Og tú skalt seta náðistólin uppá vitnisburðar-ørkina í tí mest heilaga *plássinum*.

35 Og tú skalt seta borðið uttanfyri forhangið, og ljósastakan yvir av borðinum á síðuna av tabernaklinum ímóti suðuri: og tú skalt seta borðið á norður síðuna.

36 Og tú skalt gera eina tjaldváð til dyrnar á tjaldinum, *av* bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum,* og finum tvinnaðum líni, virkað við nálararbeiði.

37 Og tú skalt gera til tjaldváðina fimm stólpar *av* sjīt´-tīm *viði,* og yvirklæða teir við gulli, *og* teirra krókar *skulu vera av* gulli: og tú skalt stoypa fimm soklar av messing til teirra.

KAPITUL 27

OG tú skalt gera eitt altar *av* sjīt´-tīm viði, fimm alnir langt, og fimm alnir breitt; altarið skal vera fýrkantað: og hæddin á tí *skal vera* tríggjar alnir.

2 Og tú skalt gera hornini hjá tí uppiá teimum fýra hjørnunum á tí: hans horn skulu vera av hinum sama: og tú skalt yvirklæða tað við messing.

3 Og tú skalt gera hans pannur til at taka við øskum hans, og hans skuplur, og hans kør, og hans kjøtkrókar, og hans eldpannur: øll íløtini harav skalt tú gera *av* messing.

4 Og tú skalt gera til tess eina rimaverks grind *av* messing; og uppá netið skalt tú gera fýra messing ringar í tey fýra hjørnini á tí.

5 Og tú skalt seta tað undir umgirðingina av altarinum niðanvert, at netið má vera enntá til miðjuna av altarinum.

6 Og tú skalt gera stavir til altarið, stavir *av* sjīt´-tīm viði, og yvirklæða teir við messing.

7 Og stavirnir skulu verða settir inn í ringarnar, og stavirnir skulu vera uppiá teimum tveimum síðunum av altarinum, til at bera tað.

8 Innanopið við borðum skalt tú gera tað: eins og tað varð sýnt tær á fjallinum, so skulu teir gera *tað*.

9 ¶ Og tú skalt gera forgarðin av tabernaklinum: til suður síðuna suðureftir *skulu vera* tjaldváðir til forgarðin *av* finum tvinnaðum líni á eitt hundrað alnir langar til ēina síðu:

10 Og teir tjúgu stólparnir harav og teirra tjúgu soklar *skulu vera av* messing; krókarnir hjá stólpunum og teirra ásløg *skulu vera av* silvuri.

11 Og líkaleiðis til norður síðuna í longd *skulu vera* tjaldváðir, eitt hundrað *alna* langar, og hans tjúgu stólpar og teirra tjúgu soklar *av* messing; krókarnir hjá stólpunum og teirra ásløg *av* silvuri.

12 ¶ Og *til* breiddina á forgarðinum á vestur síðuni *skulu vera* tjaldváðir á fimti alnir: teirra stólpar tíggju, og teirra soklar tíggju.

13 Og breiddin á forgarðinum á eystur síðuni eystantil *skal vera* fimti alnir.

14 Tjaldváðirnar av ēinari síðu *av portrinum skulu vera* fimtan alnir: teirra stólpar tríggir, og teirra soklar tríggir.

15 Og á hīnari síðuni *skulu vera* tjaldváðir, fimtan *alnir:* teirra stólpar tríggir, og teirra soklar tríggir.

16 ¶ Og til portrið av forgarðinum *skal vera* ein tjaldváð á tjúgu alnir, *av* bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum,* og finum tvinnaðum líni, virkað við nálararbeiði: *og* teirra stólpar *skulu vera* fýra, og teirra soklar fýra.

17 Allir stólparnir rundan um forgarðin *skulu hava* ásløg av silvuri; teirra krókar *skulu vera av* silvuri, og teirra soklar *av* messing.

18 ¶ Longdin á forgarðinum *skal vera* eitt hundrað alnir, og breiddin fimti allastaðni, og hæddin fimm alnir *av* finum tvinnaðum líni, og teirra soklar *av* messing.

19 Øll íløtini av tabernaklinum í allari tess tænastu, og allir hælir tess, og allir hælirnir av forgarðinum, *skulu vera av* messing.

20 ¶ Og tú skalt bjóða Ísraels børnum, at teir beri tær skíra

olivinolju sligna til ljósið, at elva lampuni at brenna altíð.

21 Í samkomu-tabernaklinum uttanfyri forhangið, sum *er* frammanfyri vitnisburðin, skulu Aaron og hansara synir hagreiða hana frá kvøldi til morgun frammi fyri HARRANUM: *tað skal vera* ein áseting um ævir hjá teirra ættum, Ísraels barna vegna.

KAPITUL 28

OG tak tú at tær Aaron, bróður tín, og synir hansara við honum, burturúr børnum Ísraels, at hann má tæna at mær í prestsembætinum, *enntá* Aaron, Nádab, og Ā´-bĭ-hû, Él-ē-ā´-zâr og Ĭth´-ă-mâr, synir Aarons.

2 Og tú skalt gera heilag klæðir til Aarons, bróðurs tíns, til dýrdar og til vakurleika.

3 Og tú skalt tala við allar *sum eru* víshjartaðir, hvørjar eg havi fylt við anda vísdóms, at teir mega gera klæðini hjá Aaroni til at innvíga hann, at hann má tæna at mær í prests-embætinum.

4 Og hesi *eru* klæðini, sum teir skulu gera; ein bróstskjøldur, og eina ê-phōd´-u, og eina skikkju, og ein skreytaðan kyrtil, eina vavhúgvu, og ein gyrðil: og teir skulu gera heilag klæðir til Aarons, bróðurs tíns, og sona hans, at hann má tæna at mær í prestsembætinum.

5 Og teir skulu taka gull, og blátt, og purpur, og skarlaks*reytt,* og fint lín.

6 ¶ Og teir skulu gera ê-phōd´-una *av* gulli, *av* bláum, og *av* purpuri, *av* skarlaks*reyðum,* og finum tvinnaðum líni, við hegnigum verki.

7 Hon skal hava tey tvey akslastykkini av henni skoytt við teir tveir kantarnar av henni; og *soleiðis* skal hon verða skoytt saman.

8 Og hin kynstriligi gyrðilin hjá ê-phōd´-uni, sum *er* uppiá henni, skal vera av hinum sama, samsvarandi við verkið harav; *enntá av* gulli, *av* bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum,* og finum tvinnaðum líni.

9 Og tú skalt taka tveir ónyks steinar, og rista á teir nøvnini hjá børnum Ísraels:

10 Seks av teirra nøvnum á ēin stein, og *hīni* seks nøvnini hjá restini á hīn steinin, samsvarandi við teirra føðing.

11 Við verkinum hjá einum íristara í stein, *líka sum* íristingarnar hjá eini signett, skalt tú írista teir tveir steinarnar við nøvnunum hjá børnum Ísraels: tú skalt gera teir til at verða settar í groypingar av gulli.

12 Og tú skalt seta teir tveir steinarnar uppá akslarnar av ê-phōd´-uni *til* áminningarsteinar at Ísraels børnum: og Aaron skal bera teirra nøvn frammi fyri HARRANUM uppiá akslum sínum tveim til eina áminning.

13 ¶ Og tú skalt gera groypingar *av* gulli;

14 Og tvær ketur *av* skírum gulli við endarnar; *av* snúraðum arbeiði skalt tú gera tær, og festa tær snúraðu keturnar til groypingarnar.

15 ¶ Og tú skalt gera dómsbróstskjøldurin við hegnigum verki; eftir verkinum hjá ê-phōd´-uni skalt tú gera hann; *av* gulli, *av* bláum, og *av* purpuri, og *av* skarlaks*reyðum,* og *av* finum tvinnaðum líni, skalt tú gera hann.

16 Fýrkantaður skal hann vera, *verandi* tvífaldaður; ein sponn *skal vera* longd hans, og ein sponn *skal vera* breidd hans.

17 Og tú skalt seta í hann setingar av steinum, *enntá* fýra røðir av steinum: *hin fyrsta* røðin *skal vera* ein sardis, ein tōpaz, og ein karfunkul: *hetta skal vera* hin fyrsta røðin.

18 Og hin onnur røðin *skal vera* ein smaragdur, ein sapphīrur, og ein diamantur.
19 Og hin triðja røðin ein ligūr, ein agāt, og ein ámetýst.
20 Og hin fjórða røðin ein beryllur, og ein ónyks, og ein jaspis: teir skulu verða settir í gull í innilokingum sínum.
21 Og steinarnir skulu vera við nøvnunum hjá børnum Ísraels, tólv, samsvarandi við nøvn teirra, *líka sum* íristingarnar hjá eini signett; hvør *og* ēin við sínum navni skulu teir vera samsvarandi við tær tólv ættargreinirnar.
22 ¶ Og tú skalt gera uppá bróstskjøldurin ketur við endarnar *av* snúraðum verki *av* skírum gulli.
23 Og tú skalt gera uppá bróstskjøldurin tveir ringar av gulli, og skalt seta teir tveir ringarnar á teir tveir endarnar av bróstskjøldrinum.
24 Og tú skalt seta tær tvær snúraðu *keturnar* av gulli í teir tveir ringarnar, *sum eru* á endunum av bróstskjøldrinum.
25 Og *hīnar* tveir endarnar av teimum tveimum snúraðu *ketunum* skalt tú festa í tær tvær groypingarnar, og seta *tær* á akslastykkini hjá ê-phōd´-uni frammanfyri *á* henni.
26 ¶ Og tú skalt gera tveir ringar av gulli, og tú skalt seta teir uppá teir tveir endarnar av bróstskjøldrinum á hansara líning, sum *er* á síðuni av ê-phōd´-uni inneftir.
27 Og tveir *aðrar* ringar av gulli skalt tú gera, og skalt seta teir á tær tvær síðurnar av ê-phōd´-uni í neðra, ímóti frampartinum av henni, yvir av *hīnari* koplingini av henni, omanfyri hin kynstriliga gyrðilin hjá ê-phōd´-uni.
28 Og teir skulu binda bróstskjøldurin eftir hansara ringum at ringunum hjá ê-phōd´-uni við einum festi av bláum, at *hann* má vera omanfyri hin kynstriliga gyrðilin hjá ê-phōd´-uni, og at bróstskjøldurin ei verði loystur frá ê-phōd´-uni.
29 Og Aaron skal bera nøvnini hjá Ísraels børnum í dóms-bróstskjøldrinum uppiá sínum hjarta, tá ið hann fer inn til hitt heilaga *plássið*, til eina áminning frammi fyri HARRANUM áframhaldandi.
30 ¶ Og tú skalt seta í dóms-bróstskjøldurin Ū´-rīm-in og Thūm´-mīm-in; og teir skulu vera uppiá hjarta Aarons, tá ið hann fer inn framfyri HARRAN: og Aaron skal bera dóm Ísraels barna uppiá sínum hjarta frammi fyri HARRANUM áframhaldandi.
31 ¶ Og tú skalt gera skikkjuna hjá ê-phōd´-uni alla *av* bláum.
32 Og tað skal vera eitt hol í toppinum av henni, á miðjuni av henni: hon skal hava eina binding av vovnum verki rundan um holið á henni, sum var tað holið á eini bróstbrynju, at tað ei verði skrætt.
33 ¶ Og *í neðra* uppá faldin á henni skalt tú gera granateplir *av* bláum, og *av* purpuri, og *av* skarlaks*reyðum*, rundan um faldin á henni; og bjøllur av gulli ímillum tey runt umkring:
34 Ein gylt bjølla og eitt granatepli, ein gylt bjølla og eitt granatepli, uppiá faldinum á skikkjuni runt umkring.
35 Og hon skal vera uppiá Aaroni til at tæna: og hansara ljóð skal verða hoyrt tá ið hann fer inn til hitt heilaga *plássið* framfyri HARRAN, og tá ið hann kemur út, at hann doyggi ei.
36 ¶ Og tú skalt gera eina plátu *av* skírum gulli, og rista uppá hana, *líka sum* íristingarnar hjá eini signett, HEILAGLEIKI TIL HARRANS.
37 Og tú skalt seta hana á eitt blátt festi, at hon má vera uppiá vavhúgvuni; uppiá frampartinum av vavhúgvuni skal hon vera.

38 Og hon skal vera uppiá pannu Aarons, at Aaron má bera misgerð hinna heilagu luta, sum Ísraels børn skulu halga í øllum sínum heilagu gávum; og hon skal vera altíð uppiá hans enni, at teir mega verða góðtiknir frammi fyri HARRANUM.

39 ¶ Og tú skalt skreytseyma kyrtilin av fínum líni, og tú skalt gera vavhúgvuna *av* fínum líni, og tú skalt gera gyrðilin *av* nálararbeiði.

40 ¶ Og til synirnar hjá Aaroni skalt tú gera kyrtlar, og tú skalt gera til teir gyrðlar, og høvuðbúnar skalt tú gera til teir, til dýrdar og til vakurleika.

41 Og tú skalt koyra teir uppá Aaron tín bróður, og hansara synir við honum; og skalt salva teir, og innvíga teir, og halga teir, at teir mega tæna at mær í prestsembætinum.

42 Og tú skalt gera teimum línbrøkur at dekka teirra nakni; frá lendunum enntá at lørunum skulu tær røkka:

43 Og tær skulu vera uppiá Aaroni, og uppiá sonum hansara, tá ið teir koma inn til samkomutabernaklið, ella tá ið teir koma nær at altarinum at tæna í tí heilaga *plássinum;* at teir beri ikki misgerð, og doyggi: *tað skal vera* ein áseting um ævir hjá honum og hansara sáði eftir hann.

KAPITUL 29

OG hetta *er* tað tingið sum tú skalt gera við teir til at halga teir, til at tæna at mær í prestsembætinum: Tak ēin ungan ungtarv, og tveir veðrar uttan lýti,

2 Og ósúrgað breyð, og køkur ósúrgaðar avstemmaðar við olju, og flatkøkur ósúrgaðar salvaðar við olju: *av* hveitimjøli skalt tú gera tær.

3 Og tú skalt koyra tey inn í ēina tægu, og koma við teimum í tæguni, við ungtarvinum og teimum tveimum veðrunum.

4 Og Aaron og hansara synir skalt tú føra at hurðini á samkomu-tabernaklinum, og skalt tváa teimum við vatni.

5 Og tú skalt taka klæðini, og lata Aaron í kyrtilin, og skikkjuna hjá ê-phōd´-uni, og ê-phōd´-una, og bróstskjøldurin, og gyrða hann við tí kynstriliga gyrðlinum hjá ê-phōd´-uni:

6 Og tú skalt seta vavhúgvuna uppá høvur hansara, og set hina heilagu krúnu uppá vavhúgvuna.

7 So skalt tú taka salvingaroljuna, og hella *hana* uppá høvur hansara, og salva hann.

8 Og tú skalt føra synir hansara, og koyra kyrtlar uppá teir.

9 Og tú skalt gyrða teir við gyrðlum, Aaron og synir hansara, og koyra høvuðbúnarnar á teir: og prests-embætið skal vera teirra til eina viðvarandi áseting: og tú skalt innvíga Aaron og synir hansara.

10 Og tú skalt fáa ein ungtarv at verða førdan framfyri samkomu-tabernaklið: og Aaron og hansara synir skulu koyra sínar hendur uppá høvur ungtarvsins.

11 Og tú skalt drepa ungtarvin frammi fyri HARRANUM, *við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum.

12 Og tú skalt taka av blóðinum av ungtarvinum, og koyra *tað* uppá hornini á altarinum við fingri tínum, og hella alt blóðið við síðuna av botninum á altarinum.

13 Og tú skalt taka alt feittið sum dekkar innvølirnar, og broddin *sum er* uppiyvir livrini, og tey tvey nýruni, og feittið sum *er* uppiá teimum, og brenna *tey* uppiá altarinum.

14 Men kjøtið av ungtarvinum, og hansara húð, og hansara mykju, skalt tú brenna við eldi uttanfyri leirin: tað *er* eitt syndoffur.

15 ¶ Tú skalt eisini taka ēin veðr; og Aaron og hansara synir

skulu koyra sínar hendur uppá høvdið á veðrinum.

16 Og tú skalt vega veðrin, og tú skalt taka hansara blóð, og sletta *tað* runt umkring uppá altarið.

17 Og tú skalt skera veðrin í stykkir, og tváa hans innvølir, og hansara leggir, og seta *teir* at hansara stykkjum, og at høvdi hansara.

18 Og tú skalt brenna allan veðrin uppiá altarinum: tað *er* eitt brennioffur at HARRANUM: tað *er* ein søtur angi, eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM.

19 ¶ Og tú skalt taka hīn veðrin; og Aaron og hansara synir skulu koyra sínar hendur uppá høvdið á veðrinum.

20 So skalt tú drepa veðrin, og taka av hansara blóði, og koyra *tað* uppá tippin á høgra oyranum hjá Aaroni, og uppá tippin á høgra oyranum hjá sonum hansara, og uppá tummilin av teirra høgru hond, og uppá stórutánna av teirra høgra fóti, og sletta blóðið uppá altarið runt umkring.

21 Og tú skalt taka av blóðinum sum *er* uppiá altarinum, og av salvingar-oljuni, og sletta *tað* uppá Aaron, og uppá hansara klæðir, og uppá hansara synir, og uppá klæðini hjá hansara sonum við honum: og hann skal vera halgaður, og hansara klæðir, og hansara synir, og klæðini hjá hansara sonum við honum.

22 Eisini skalt tú taka av veðrinum feittið og feithalan, og feittið sum dekkar innvølirnar, og broddin *uppiyvir* livrini, og tey tvey nýruni, og feittið sum *er* uppiá teimum, og høgra bógvin; tí at tað *er* ein innvígingar-veðrur:

23 Og ēitt heilbreyð, og ēina køku av oljaðum breyði, og ēina flatkøku úr tæguni av tí ósúrgaða breyðinum sum *er* frammi fyri HARRANUM:

24 Og tú skalt leggja alt í hendurnar hjá Aaroni, og í hendurnar hjá sonum hansara; og skalt reiggja tey *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM.

25 Og tú skalt móttaka tey av teirra hondum, og brenna *tey* uppiá altarinum til eitt brennioffur, til ein søtan anga frammi fyri HARRANUM: tað *er* eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM.

26 Og tú skalt taka bringuna av veðrinum av Aarons innvíging, og reiggja hana *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM: og tað skal vera tín partur.

27 Og tú skalt halga bringuna av reiggiofrinum, og bógvin av hevjiofrinum, sum verður reiggjað, og sum verður hevjað upp, av innvígingar-veðrinum, *enntá* av *tí* sum *er* fyri Aaron, og av *tí* sum er fyri synir hansara:

28 Og tað skal vera Aarons og sona hansara við eini áseting um ævir frá børnum Ísraels: tí at tað *er* eitt hevjioffur: og tað skal vera eitt hevjioffur frá børnum Ísraels av sláturofrinum av teirra friðofrum, *enntá* teirra hevjioffur at HARRANUM.

29 ¶ Og tey heilagu klæðini hjá Aaroni skulu vera sona hansara eftir hann, at verða salvaðir harí, og at verða innvígaðir í teimum.

30 *Og* tann sonurin, sum er prestur í hansara stað, skal lata *seg* í tey sjey dagar, tá ið hann kemur inn í samkomu-tabernaklið at tæna í tí heilaga *plássinum*.

31 ¶ Og tú skalt taka veðrin av innvígingini, og sjóða kjøt hans í tí heilaga plássinum.

32 Og Aaron og hansara synir skulu eta kjøtið av veðrinum, og breyðið sum *er* í tæguni, *við* hurðina á samkomu-tabernaklinum.

33 Og teir skulu eta tey tingini, við hvørjum sáttargerðin varð gjørd, til at innvíga *og* at halga teir: men ein fremmandur skal ikki eta *harav,* av tí at tey *eru* heilag.

34 Og um okkurt av kjøtinum av innvígingunum, ella av breyðinum, verði verandi at morgninum, so skalt tú brenna avlopið við eldi: tað skal ei verða etið, av tí at tað *er* heilagt.

35 Og soleiðis skalt tú gera at Aaroni, og við hansara synir, samsvarandi við øll *ting* sum eg havi skipað tær: sjey dagar skalt tú innvíga teir.

36 Og tú skalt ofra hvønn dag ein ungtarv *til* eitt syndoffur til sáttargerð: og tú skalt reinsa altarið, tá ið tú hevurt gjørt eina sáttargerð fyri tað, og tú skalt salva tað, til at halga tað.

37 Sjey dagar skalt tú gera eina sáttargerð fyri altarið, og halga tað; og tað skal vera eitt altar mest heilagt: hvatsumhelst *ið* nemur við altarið skal vera heilagt.

38 ¶ Nú, hetta *er tað* sum tú skalt ofra uppiá altarinum; tvey fyrsta árs lomb dag um dag framhaldandi.

39 Tað ēina lambið skalt tú ofra um morgunin; og hītt lambið skalt tú ofra um aftan:

40 Og við tí ēina lambinum ein tíggjunddeil av mjøli, blandað við fjórðingspartin av eini hīn av slignari olju; og fjórðingspartin av eini hīn av víni *til* drykkoffurs.

41 Og hītt lambið skalt tú ofra um aftan, og skalt gera við tað samsvarandi við matoffur morgunsins, og samsvarandi við drykkoffur tess, til ein søtan anga, eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM.

42 *Hetta skal vera* eitt áframhaldandi brennioffur út gjøgnum ættir tykkara *við* hurðina á samkomu-tabernaklinum frammi fyri HARRANUM: har eg vil møta tykkum, til at tala har innat tær.

43 Og har vil eg møtast við Ísraels børnum, og *tabernaklið* skal vera halgað av míni dýrd.

44 Og eg vil halga samkomutabernaklið, og altarið: eg vil halga eisini bæði Aaron og synir hansara, til at tæna til mín í prests-embætinum.

45 ¶ Og eg vil búgva millum Ísraels barna, og vil vera Guð teirra.

46 Og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN teirra Guð, sum førdi teir fram út úr Egyptalandi, at eg má dvøljast teirra millum: eg *eri* HARRIN Guð teirra.

KAPITUL 30

OG tú skalt gera eitt altar til at brenna roykilsi uppiá: *av* sjīt´-tīm viði skalt tú gera tað.

2 Ein alin *skal vera* longdin á tí, og ein alin breiddin á tí; fýrkantað skal tað vera: og tvær alnir *skal vera* hæddin á tí: hornini hjá tí *skulu vera* av tí sama.

3 Og tú skalt yvirklæða tað við skírum gulli, toppin á tí, og síðurnar á tí runt umkring, og hornini hjá tí; og tú skalt gera tí eina krúnu av gulli runt umkring.

4 Og tveir gyltar ringar skalt tú gera til tað undir krúnuna hjá tí, við tey tvey hjørnini á tí, uppá tær tvær síðurnar av tí skalt tú gera *tað;* og teir skulu vera til støð til stavirnar at bera tað við.

5 Og tú skalt gera stavirnar *av* sjīt´-tīm viði, og yvirklæða teir við gulli.

6 Og tú skalt seta tað frammanfyri forhangið, sum *er* við vitnisburðar-ørkina; frammanfyri náðistólin, sum *er* yvir vitnisburðinum, har eg vil møtast við tær.

7 Og Aaron skal brenna á tí søtt roykilsi hvønn morgun: tá ið hann hagreiðir lampurnar, skal hann brenna roykilsi uppiá tí.

8 Og tá ið Aaron kveikir lampurnar um aftan, skal hann brenna roykilsi uppiá tí, eitt áframhaldandi roykilsi frammi fyri HARRANUM út gjøgnum ættir tykkara.

9 Tit skulu einkið fremmant roykilsi ofra hará, ella brenni-

sláturoffur, ella matoffur; eiheldur skulu tit hella drykkoffur haŕ.
10 Og Aaron skal gera eina sáttargerð uppiá hornunum á tí ēina ferð um árið við blóðinum av sáttargerða˘-syndofrinum: ēina ferð um árið skal hann gera sáttargerð uppiá tí út gjøgnum ættir tykkara: tað *er* HARRANUM mest heilagt.
11 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
12 Tá ið tú tekurt samløguna av Ísraels børnum eftir teirra tali, tá skulu teir geva hvør maður eitt loysnargjald fyri sína sál at HARRANUM, tá ið tú upptelurt teir; at tað verði eingin plága teirra millum, tá ið *tú* upptelurt teir.
13 Hetta skulu teir geva, hvør tann sum ferðast millum teirra sum verða upptaldir, hálvan sjē´-kūl eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum: (ein sjē´-kūl *er* tjúgu gē´-râh-ir:) ein hálvur sjē´-kūl *skal vera* offur HARRANS.
14 Hvør tann ið ferðast millum teirra sum verða upptaldir, frá tjúgu ára gomlum og omanfyri, skal geva eitt offur at HARRANUM.
15 Hin riki skal ikki geva meira, og hin fátæki skal ikki geva minni enn hálvan sjē´-kūl, tá ið *teir* geva eitt offur at HARRANUM, til at gera eina sáttargerð fyri sálir tykkara.
16 Og tú skalt taka sáttargerðar-peningin av Ísraels børnum, og skalt tilskila hann til tænastu samkomu-tabernakkulsins; at hann má vera ein áminning yvirfyri Ísraels børnum frammi fyri HARRANUM, til at gera eina sáttargerð fyri sálir tykkara.
17 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
18 Tú skalt eisini gera eitt tváttarker *av* messing, og hans fót *eisini av* messing, til at tváa *við:* og tú skalt seta tað ímillum samkomu-tabernaklið og altarið, og tú skalt koyra vatn harí.
19 Tí at Aaron og hansara synir skulu tváa sínar hendur og sínar føtur harhjá:
20 Tá ið teir fara inn í samkomu-tabernaklið, skulu teir tváa *sær* við vatni, at teir doyggi ikki; ella tá ið teir koma nær til altarið at tæna, at brenna offur gjørt við˘ eldi at HARRANUM:
21 So teir skulu tváa sínar hendur og sínar føtur, at teir doyggi ikki: og tað skal vera ein áseting um ævir hjá teimum, *enntá* hjá honum og hjá hansara sáði út gjøgnum ættir teirra.
22 ¶ Haraftrat talaði HARRIN við Móses, sigandi,
23 Tak tú eisini at tær aðal kryddurtir, av skírari myrrhu fimm hundrað *sjē´-kl-ar,* og av søtum kaneli helvtina so nógv, *enntá* tvey hundrað og fimti *sjē´-kl-ar,* og av søtum kalmus tvey hundrað og fimti *sjē´-kl-ar,*
24 Og av kassia fimm hundrað *sjē´-kl-ar,* eftir sjē´-kl-i halgidómsins, og av olivinolju eina hîn:
25 Og tú skalt gera tað *til* eina heilaga smyrsils-olju, ein smyrsil blanding eftir apotekarans kynstri: tað skal vera ein heilag salvingarolja.
26 Og tú skalt salva samkomu-tabernaklið við tí, og vitnisburðarørkina,
27 Og borðið og øll reiðir hans, og ljósastakan og reiðir hans, og roykilsis-altarið,
28 Og brennioffurs-altarið við øllum reiðum hans, og tváttarkerið og fót hans.
29 Og tú skalt halga tey, at tey mega vera mest heilag: hvatsumhelst *ið* nemur við tey, skal vera heilagt.
30 Og tú skalt salva Aaron og synir hans, og innvíga teir, at *teir* mega tæna at mær í prestsembætinum.
31 Og tú skalt tala við børn Ísraels, sigandi, Hetta skal vera

ein heilag salvingar-olja at mær út gjøgnum ættir tykkara.

32 Uppá kjøt mans skal hon ei verða helt, eiheldur skulu tit gera *nakra aðra* líka *sum* hon, eftir samansetingini av henni: hon *er* heilag, *og* hon skal vera tykkum heilag.

33 Hvørsumhelst *ið* blandar *nakra* líka *sum* hon, ella hvørsumhelst *ið* koyrir *nakað* av henni uppá ein fremmandan, skal enntá verða skorin av frá fólki hans.

34 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Tak at tær søtar kryddurtir, stǎk´-tû, og ónyks skel, og gǎl´-bâ-nûm; *hesar* søtu kryddurtir við skírum viraki: av hvørjum skal tað vera ein líka *vekt:*

35 Og tú skalt gera tað eitt angilsi, eina søtblanding eftir apotekarans kynstri, avstemmað saman, skírt *og* heilagt:

36 Og tú skalt mylja *nakað* av tí sera smátt, og seta av tí frammanvert *við* vitnisburðin í samkomutabernaklinum, har eg vil møtast við tær: tað skal vera tykkum mest heilagt.

37 Og *hvat viðvíkur* angilsinum sum tú skalt gera, tit skulu ikki gera til tykkara sjálvs samsvarandi við samanseting tess: tað skal vera tær heilagt fyri HARRANUM.

38 Hvørsumhelst *ið* skal gera líkt tí, til at lukta hartil, skal enntá verða skorin av frá fólki hans.

KAPITUL 31

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Sí, eg havi kallað við^ navni Bĕz-á´-lēēl Ū´-rī-s son, Hūrs son, av ættargrein Judah:

3 Og eg havi fylt hann við anda Guðs, í vísdómi, og í skili, og í kunnleika, og í alskyns handverki,

4 Til at upphugsa hegnis*lig* verk, til at virka í gulli, og í silvuri, og í messing,

5 Og í skering av steinum, at seta *teir,* og í telging av timbri, at virka í alskyns handverki.

6 Og eg, sí, eg havi givið við honum Ă-hó´-lī-ăb, son Ă-hĭs´-ă-măch-s, av ættargrein Dáns: og í hjørtuni á øllum, sum eru vishjartaðir, havi eg lagt vísdóm, at teir mega gera alt sum eg havi áboðið tær;

7 Samkomu-tabernaklið, og vitnisburðar-ørkina, og náðistólin sum *er* haruppiá, og allan útbúnaðin hjá tabernaklinum,

8 Og borðið og útbúnað hans, og hin skíra ljósastaka við allari útgerð hans, og roykilsis-altarið,

9 Og brennioffurs-altarið við øllum útbúnaði hans, og tváttarkerið og fót hans,

10 Og tænastu pløggini, og tey heilagu klæðini til Aarons prests, og klæðini hjá sonum hansara, til at tæna í prests-embætinum,

11 Og salvingar-oljuna, og søtt roykilsi til tað heilaga *plássið:* samsvarandi við alt sum eg havi skipað tær, skulu teir gera.

12 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

13 Tala tú eisini við børn Ísraels, sigandi, Sanniliga, mínar sabbatar skulu tit halda: tí at tað *er* eitt tekin ímillum meg og tykkum út gjøgnum ættir tykkara; at *tit* mega vita, at eg *eri* HARRIN sum halgar tykkum.

14 Tit skulu halda sabbatin tessvegna; tí at hann *er* heilagur tykkum: hvør tann sum dálkar hann skal vissuligani verða tikin av lívi: tí at hvørsumhelst *ið* ger *nakað* arbeiði harí, tann sál skal verða skorin av burturúr fólki hans.

15 Seks dagar kann arbeiði verða gjørt; men á hinum sjeynda *er* hvíldar-sabbaturin, heilagur fyri HARRANUM: hvørsumhelst *ið* ger *nakað* arbeiði á sabbatsdeginum, hann skal vissuligani verða tikin av lívi.

16 Hvørsvegna Ísraels børn

skulu halda sabbatin, til at geva ans *eftir* sabbatinum út gjøgnum ættir teirra, *til* ein áframhaldandi sáttmála.

17 Hann *er* eitt tekin ímillum meg og børn Ísraels um ævir: tí *á* seks døgum gjørdi HARRIN himin og jørð, og á hinum sjeynda degi hvíldi hann, og varð endurfriskaður.

18 ¶ Og hann gav Mósesi, tá ið hann hevði lokið við at samtala við hann uppiá Sĭ´-năi fjalli, tvær vitnisburðar-talvur, steintalvur, skrivaðar við fingri Guðs.

KAPITUL 32

OG tá ið fólkið sá, at Móses drálaði *við* at koma oman av fjallinum, savnaði fólkið seg saman at Aaroni, og segði við hann, Upp, ger okkum gudar, sum skulu fara undan okkum; tí at *hvat* hesum Mósesi *viðvíkur,* manninum sum førdi okkum upp úr Egyptalandi, vit vita ikki hvat er vorðið av honum.

2 Og Aaron segði við teir, Brótið av hinar gyltu oyrnaringarnar, sum *eru* í oyrunum hjá konum tykkara, hjá sonum tykkara, og hjá døtrum tykkara, og førið *teir* at mær.

3 Og alt fólkið breyt av hinar gyltu oyrnaringarnar sum *vóru* í teirra oyrum, og førdi *teir* at Aaroni.

4 Og hann móttók *teir* av teirra hond, og evnaði tað við einum ristingar tóli, eftir *at* hann hevði gjørt tað *til* ein bræddan kálv: og teir søgdu, Hesir *veri* gudar tínir, O Ísrael, sum førdu teg upp út úr Egyptalandi.

5 Og tá ið Aaron sá *tað,* bygdi hann eitt altar frammanfyri honum; og Aaron gjørdi kunngerð, og segði, Í morgin *er* ein hátíð fyri HARRANUM.

6 Og teir risu upp árla á morgindeginum, og ofraðu brennioffur˘, og førdu friðoffur˘; og fólkið settist niður at eta og at drekka, og reistist upp at spæla.

7 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Far, slepp tær oman; tí at fólk títt, sum tú førdirt út úr Egyptalandi, hava spilt *seg sjálvar:*

8 Teir hava vent til viks snarligani út av veginum sum eg beyð teimum: teir hava gjørt sær ein bræddan kálv, og hava tilbiðið hann, og hava sláturofrað harat, og sagt, Hesir *veri* gudar tínir, O Ísrael, sum hava ført teg upp út úr Egyptalandi.

9 Og HARRIN segði við Móses, Eg havi sæð hetta fólkið, og sí, tað *er* eitt harðsvírað fólk:

10 Nú tessvegna, lat meg vera, at mín vreiði má vaksa heit ímóti teimum, og at eg má upptæra teir: og eg vil gera úr tær eina mikla tjóð.

11 Og Móses bønaði HARRAN Guð sín, og segði, HARRI, hví veksur tín vreiði heit ímóti tínum fólki, sum tú hevurt ført fram út úr Egyptalandi við miklari kraft, og við eini mektigari hond?

12 Hvørsvegna skuldu Egyptarnir talað, og sagt, Til mein førdi hann teir út, til at bana teimum á fjøllunum, og til at upptæra teir frá ásjón jarðarinnar? Vend frá tíni ógvisligu vreiði, og iðrast um hetta illa ímóti fólki tínum.

13 Minst til Ábrahams, Ísaaks, og Ísraels, tænara tína, til hvørja tú svórt við sjálvt teg sjálvan, og segðirt við teir, Eg vil margfalda sáð tykkara sum stjørnur himins, og alt hetta land, sum eg havi talað um, vil eg geva sáði tykkara, og teir skulu arva *tað* um ævir.

14 Og HARRIN iðraðist um hitt illa, sum hann hugsaði at gera fólki sínum.

15 ¶ Og Móses vendi, og fór oman frá fjallinum, og hinar tvær talvur vitnisburðarins *vóru* í hond hansara: talvurnar *vóru*

skrivaðar á báðar síður teirra; á ta ēinu síðuna og á hīna *vóru* tær skrivaðar.

16 Og talvurnar *vóru* verk Guðs, og skriftin *var* skrift Guðs, rist uppá talvurnar.

17 Og tá ið Josjua hoyrdi ljóðið av fólkinum, sum tey róptu, segði hann við Móses, *Tað er* eitt ljóð av kríggi í leirinum.

18 Og hann segði, *Tað er* ikki røddin á *teimum sum* rópa um meistaraskap, eiheldur *er tað* røddin á *teimum sum* rópa um at vera vunnir á: *men* ljóðið á *teimum, sum* syngja, hoyri eg.

19 ¶ Og tað bar á, so skjótt sum hann kom nær at leirinum, at hann sá kálvin, og dansingina: og Móse firtni vaks heit, og hann kastaði talvurnar út úr hondum sínum, og breyt tær niðriundir fjallinum.

20 Og hann tók kálvin sum teir høvdu gjørt, og brendi *hann* í eldinum, og muldi *hann* til pulvur, og stroyddi *tað* uppá vatnið, og fekk Ísraels børn *at* drekka *av tí*.

21 Og Móses segði við Aaron, Hvat gjørdi hetta fólk at tær, at tú hevurt ført so mikla synd uppá teir?

22 Og Aaron segði, Lat ikki firtni harra míns vaksa heita: tú kennirt fólkið, at teir *eru innstillaðir inn* á mein.

23 Tí at teir søgdu við meg, Ger okkum gudar, sum skulu fara undan okkum: tí *hvat* hesum Mósesi *viðvíkur*, manninum sum førdi okkum upp út úr Egyptalandi, vit vita ikki hvat er vorðið av honum.

24 Og eg segði við teir, Hvørsumhelst *ið* hevur nakað gull, lat tey bróta *tað* av. So tey góvu *tað* mær: síðan kastaði eg tað inn í eldin, og tað kom út hesin kálvur.

25 ¶ Og tá ið Móses sá, at fólkini *vóru* nakin; (tí at Aaron hevði gjørt tey nakin, *teimum* til skammar millum fígginda teirra:)

26 Tá stóð Móses í portrinum av leirinum og segði, Hvør *er* á HARRANS síðu? *lat hann koma* at mær. Og allir synir Levīs savnaðu seg saman at honum.

27 Og hann segði við teir, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Seti hvør maður svørð sítt við lið sína, *og* farið inn og út frá portri til porturs út gjøgnum leirin, og bani hvør maður bróður sínum, og hvør maður felaga sínum, og hvør maður næsta sínum.

28 Og Levīs børn gjørdu samsvarandi við orðið hjá Mósesi: og tað fullu av fólkinum tann dagin umleið trý túsund menn.

29 Tí at Móses hevði sagt, Vígið tykkum sjálvar í dag til HARRANS, enntá hvør maður omanyvir son sín, og omanyvir bróður sín; at hann má skonkja uppá tykkum eina signing henda dag.

30 ¶ Og tað bar á um morgindagin, at Móses segði við fólkið, Tit hava syndað eina mikla synd: og nú vil eg fara niðan at HARRANUM; vera má, *at* eg skal gera eina sáttargerð fyri tykkara synd.

31 Og Móses vendi aftur at HARRANUM, og segði, Á, hetta fólk hava syndað eina mikla synd, og hava gjørt sær gudar av gulli.

32 Tó nú, um tú vilt fyrigeva teirra synd—; og um ikki, sletta meg, eg biði teg, út úr tíni bók sum tú hevurt skrivað.

33 Og HARRIN segði við Móses, Hvønnsumhelst *ið* hevur syndað ímóti mær, hann vil eg sletta út úr míni bók.

34 Tessvegna nú far, leið fólkið at *tí plássi*, um hvørt eg havi talað við teg: sí, Eingil mín skal fara undan tær: hóast hetta, á tí degi tá ið eg heimsøki, vil eg heimsøkja teirra synd uppá teir.

35 Og HARRIN plágaði fólkið, av tí at teir gjørdu kálvin, sum Aaron gjørdi.

KAPITUL 33

OG HARRIN segði við Móses, Far avstað, *og* far upp hiðani, tú og fólkið sum tú hevurt ført upp úr Egyptalandi, at landinum sum eg svór Ábrahami, til Ísaaks, og til Jákobs, sigandi, Innat sáði tínum vil eg geva tað:

2 Og eg vil senda ein eingil undan tær; og eg vil reka út Cánaanitan, Amoritan, og Hittitan, og Pê-rīz-zīt´-an, Hī-vīt´-an, og Jĕb-ŭ-sīt´-an:

3 At einum landi, fløðandi við mjólk og hunangi: tí at eg vil ikki fara upp í miðjum tær; tí at tú *ert* eitt harðsvírað fólk: at ikki eg upptæri teg á veginum.

4 ¶ Og tá ið fólkið hoyrdi hesi illu tíðindir, harmaðu teir: og eingin maður setti á seg prýðir síni.

5 Tí at HARRIN hevði sagt við Móses, Sig við Ísraels børn, Tit *eru* eitt harðsvírað fólk: eg vil koma upp í miðjan teg í einum tíðarbragdi, og upptæra teg: tessvegna nú, koyr av tíni prýðir frá tær, at eg má vita hvat gera *má* tær.

6 Og Ísraels børn avklæddu seg fyri síni prýðir við fjallið Hór´-ĕb.

7 Og Móses tók tabernaklið, og uppslo tað uttanfyri leirin, langt burturi frá leirinum, og kallaði tað Samkomu-tabernaklið. Og tað bar á, *at* hvør tann sum søkti HARRAN, fór út at samkomu-tabernaklinum, sum *var* uttanfyri leirin.

8 Og tað bar á, tá ið Móses fór út at tabernaklinum, *at* alt fólkið reis upp, og stóðu hvør maður *við* sínar tjalddyr, og hugdu eftir Mósesi, inntil hann var farin inn í tabernaklið.

9 Og tað bar á, sum Móses innfór inn í tabernaklið, *at* hin skýggjuti stólpi steig niður, og stóð *við* dyrnar á tabernaklinum, og *HARRIN* talaði við Móses.

10 Og alt fólkið sá hin skýggjuta stólpa standa *við* tabernakkulsdyrnar: og alt fólkið reis upp og tilbað, hvør maður *í* tjalddyrum sínum.

11 Og HARRIN talaði við Móses andlit til andlits, sum ein maður talar við vin sín. Og hann vendi aftur inn í leirin: men hansara tænari Josjua, sonur Nuns, ein ungur maður, veik ikki úr tabernaklinum.

12 ¶ Og Móses segði við HARRAN, Sí, tú sigurt við meg, Før upp hetta fólk: og tú hevurt ikki latið meg vita, hvønn tú vilt senda við mær. Tó hevurt tú sagt, Eg kenni teg við navni, og tú hevurt eisini funnið náði í eygsjón míni.

13 Nú tessvegna, eg biði teg, um eg havi funnið náði í eygsjón tíni, sýn mær nú tín veg, at eg má kenna teg, at eg má finna náði í eygsjón tíni: og umhugsa, at henda tjóð *er* fólk títt.

14 Og hann segði, Mín nærvera skal fara *við tær,* og eg vil geva tær hvílu.

15 Og hann segði við hann, Um tín nærvera fari ikki *við mær,* før okkum ikki upp hiðani.

16 Tí at hvarí skal tað verða vitað her, at eg og fólk títt hava funnið náði í eygsjón tíni? *er tað* ikki í at tú fert við okkum? so skulu vit vera atskildir, eg og fólk títt, frá øllum fólkunum sum *eru* uppiá ásjón jarðarinnar.

17 Og HARRIN segði við Móses, Eg vil gera hetta tingið eisini sum tú hevurt talað: tí at tú hevurt funnið náði í eygsjón míni, og eg kenni teg við navni.

18 Og hann segði, Eg bøni teg, sýn mær dýrd tína.

19 Og hann segði, Eg vil lata alla mína góðsku ferðast frammi fyri tær, og eg vil kunngera navn

HARRANS frammi fyri tær; og vil vera náðisamur við hvønn *ið* eg vil vera náðisamur, og vil sýna miskunn á hvønn *ið* eg vil sýna miskunn.

20 Og hann segði, Tú kanst ikki síggja andlit mítt: tí at tað skal eingin maður síggja meg, og liva.

21 Og HARRIN segði, Sí, *tað er* eitt pláss hjá" mær, og tú skalt standa uppiá einum kletti:

22 Og tað skal bera á, meðan mín dýrd fer framvið, at eg vil seta teg í eina kliv av klettinum, og vil dekka teg við míni hond, meðan eg fari framvið:

23 Og eg vil taka burt mína hond, og tú skalt sjá mínar bakpartar: men mítt andlit skal ei verða sæð.

KAPITUL 34

OG HARRIN segði við Móses, Høgg tær tvær talvur av steini, líkar hinum fyrstu: og eg vil skriva uppá *hesar* talvur orðini sum vóru í teimum fyrstu talvunum, sum tú breytst.

2 Og ver tilreiðar í morgisárið, og kom niðan í morgisárið at Sĭ-naî fjalli, og framset teg sjálvan har fyri mær á toppinum av fjallinum.

3 Og eingin maður skal koma niðan við tær, eiheldur lat nakran mann verða sæddan út gjøgnum alt fjallið; eiheldur lat smáfæafylgini ella stórfæafylgini *ganga* á biti frammanfyri hasum fjallinum.

4 ¶ Og hann høgdi tvær talvur av steini, líkar hinum fyrstu; og Móses reis upp árla um morgunin, og fór niðan at Sĭ-naî fjalli, eins og HARRIN hevði skipað honum, og tók í sína hond tær tvær talvurnar av steini.

5 Og HARRIN steig niður í skýgginum, og stóð hjá honum har, og kunngjørdi navn HARRANS.

6 Og HARRIN fór framvið frammanfyri honum, og kunngjørdi, HARRIN, HARRIN Guð, miskunnarfullur og náðisamur, langmóðigur, og ríkiligur í góðsemi og sannleika,

7 Varðveitandi miskunn fyri túsundir, fyrigevandi misgerð og misbrot og synd, og sum vil við ongum midlum fríkenna *hin seka;* vitjandi misgerðina hjá fedrunum omanyvir børnini, og omanyvir barnabørnini, at hinum triðja og til tað fjórða *ættarliðið*.

8 Og Móses gjørdi skjótt, og boygdi sítt høvur ímóti jørðini, og tilbað.

9 Og hann segði, Um nú eg havi funnið náði í eygsjón tíni, Ó Harri, lat Harra mín, eg biði teg, fara okkara millum; tí at tað *er* eitt harðsvírað fólk; og náða okkara misgerð og okkara synd, og tak okkum til arv tín.

10 ¶ Og hann segði, Sí, eg geri ein sáttmála: frammi fyri øllum tínum fólki vil eg gera undranir, slíkar sum hava ikki verðið gjørdar á allari jørðini, ella í nakrari tjóð: og alt fólkið, hvørja millum tú *ert,* skal síggja verk HARRANS: tí at tað *er* eitt ræðuligt ting sum eg vil gera við tær.

11 Gev tú ans *eftir* tí sum eg ábjóði tær henda dag: sí, eg reki út undan tær Amoritan, og Cānaanitan, og Hittitan, og Pĕrĭz-zĭt´-an, og Hī-vĭt´-an, og Jĕb-ŭ-sĭt´-an.

12 Gev ans eftir tær sjálvum, at ikki tú geri ein sáttmála við íbúgvarnar av landinum, hvagar tú fert, at ikki tað verði til eina snerru í miðjum tær:

13 Men tit skulu oyðileggja teirra altar˘, bróta teirra myndir, og skera niður teirra lundir:

14 Tí at tú skalt tilbiðja ongan annan gud: tí at HARRIN, hvørs navn *er* Ástbrellin, *er* ein ástbrellin Guð:

15 At ikki tú geri ein sáttmála við íbúgvar landsins, og teir fari

horandi eftir teirra gudum, og geri sláturofran at teirra gudum, og *ēin* kalli teg, og tú eti av sláturofri hans;
16 Og tú taki av teirra døtrum at sonum tínum, og teirra døtur fari horandi eftir gudum sínum, og fái tínar synir at fara horandi eftir gudum sínum.
17 Tú skalt ongar bræddar gudar gera tær.
18 ¶ Hátíðina av ósúrgaðum breyði skalt tú halda. Sjey dagar skalt tú eta ósúrgað breyð, eins og eg ábeyð tær, í tíðini av mánaðinum Ábib: tí at í mánaðinum Ábib komst tú út frá Egyptalandi.
19 Alt, sum opnar móðurlívið, *er* mítt; og hvørt frumavkom millum fenað tín, *hvørt* oksi ella seyður, *sum er kallkyn*.
20 Men frumavkomið hjá einum asna skalt tú endurloysa við einum lambi: og um tú endurloysi *hann* ei, tá skalt tú bróta háls hansara. Allar frumburðarnar hjá sonum tínum skalt tú endurloysa. Og eingin skal birtast frammi fyri mær tóm*hent*ur.
21 ¶ Seks dagar skalt tú arbeiða, men á hinum sjeynda degi skalt tú hvíla: í pløgitíð og á heysti skalt tú hvíla.
22 ¶ Og tú skalt geva ans eftir hátíðini av vikum, av frumávøkstum hveitiheysts, og innheystingarhátíðini við enda ársins.
23 ¶ Tríggjar ferðir um árið skulu øll tykkara sveinsbørn birtast frammi fyri Harranum GUÐI, Ísraels Guði.
24 Tí at eg vil kasta út tjóðirnar undan tær, og vaksa um tíni landamørk: eiheldur skal nakar maður tráa land títt, tá ið tú skalt fara niðan at birtast frammi fyri HARRANUM Guði tínum tríggjar ferðir um árið.
25 Tú skalt ikki ofra blóðið av mínum sláturofri við súrdeiggi; eiheldur skal umleypshátíðarsláturofrið verða latið vera *fram*at morgninum.
26 Tað fyrsta av frumávøkstum lands tíns skalt tú føra at húsi HARRANS Guðs tíns. Tú skalt ikki sjóða eitt geitarlamb í mjólk móður hans.
27 Og HARRIN segði við Móses, Skriva tú hesi orð: tí eftir gongdini á hesum orðum havi eg gjørt ein sáttmála við teg og við Ísrael.
28 Og hann var har hjá HARRANUM fjøruti dagar og fjøruti nætur; hann hvørki át breyð, ella drakk vatn. Og hann skrivaði uppá talvurnar sáttmála-orðini, tey tíggju boðini.
29 ¶ Og tað bar á, tá ið Móses kom oman frá Sĭ-naî fjalli við teimum tveimum vitnisburðartalvunum í hond Mósesar, tá ið hann kom oman frá fjallinum, at Móses vitsti ikki, at húðin á andliti hansara skein, meðan hann talaði við hann.
30 Og tá ið Aaron og øll Ísraels børn sóu Móses, sí, húðin á andliti hansara skein; og teir vóru ræddir at koma nær honum.
31 Og Móses kallaði á teir; og Aaron og allir stjórnararnir av samkomuni vendu aftur at honum: og Móses talaði við teir.
32 Og síðan komu øll børn Ísraels nær: og hann gav teimum í ábjóðan alt sum HARRIN hevði talað við hann á Sĭ-naî fjalli.
33 Og *til* Móses var liðugur at tala við teir, koyrdi hann eitt skýli á andlit sítt.
34 Men tá ið Móses fór inn framfyri HARRAN at tala við hann, tók hann skýlið av, inntil hann kom út. Og hann kom út, og talaði við børn Ísraels *tað* sum honum var áboðið.
35 Og Ísraels børn sóu andlitið hjá Mósesi, at húðin á Móse andliti skein: og Móses koyrdi skýlið uppá andlit sítt aftur, inntil hann fór inn at tala við hann.

KAPITUL 35

OG Móses savnaði alla samkomu Ísraels barna saman, og segði við teir, Hesi *eru* orðini sum HARRIN hevur áboðið, at *tit* skuldu gera tey.

2 Seks dagar skal arbeiði verða gjørt, men á hinum sjeynda degi skal tað vera hjá tykkum ein heilagur dagur, ein hvíldar-sabbatur fyri HARRANUM: hvørsumhelst *ið* ger arbeiði harí, skal verða tikin av lívi.

3 Tit skulu ongan eld kynda út gjøgnum tykkara bústaðir á sabbatsdeginum.

4 ¶ Og Móses talaði við alla samkomu Ísraels barna, sigandi, Hetta *er* tað tingið sum HARRIN bjóðaði, sigandi,

5 Takið tit tykkara millum ífrá eitt offur at HARRANUM: hvørsumhelst *ið er* av einum viljugum hjarta, lat hann koma við tí, eitt offur HARRANS; gull, og silvur, og messing,

6 Og blátt, og purpur, og skarlaks*reytt,* og fínt lín, og geita*hár,*

7 Og veðraskinn litað reyð, og grevlingaskinn˘, og sjít´-tím við˘,

8 Og olju til ljósið, og kryddaríir til salvingar-olju, og til tað søta roykilsið,

9 Og ónyks steinar, og steinar at verða settar til ê-phōd´-una, og til bringuskjøldurin.

10 Og hvør víshjartaður tykkara millum skal koma, og gera alt sum HARRIN hevur boðið;

11 Tabernaklið, tjald hans, og dekking hans, krókar hans, og *tilju*borð hans, tvørtrø hans, stólpar hans, og soklar hans,

12 Ørkina, og stavirnar harav, *við* náðistólinum, og dekkingarforhanginum,

13 Borðið, og stavir hans, og øll reiðir hans, og sýnisbreyðið,

14 Ljósastakan eisini til ljósið, og útbúnað hans, og lampur hans, við oljuni til ljósið,

15 Og roykilsis-altarið, og stavir hans, og salvingar-oljuna, og tað søta roykilsið, og tjaldváðina til hurðina við inngongdina inn av tabernaklinum,

16 Brennioffurs-altarið, við tess messing rimaverki, stongum hans, og øllum reiðum hans, tváttarkerið og fót hans,

17 Tjaldváðirnar hjá forgarðinum, hansara stólpar, og teirra soklar, og tjaldváðina til hurðina av forgarðinum,

18 Hælirnar hjá tabernaklinum, og hælirnar hjá forgarðinum, og teirra bond,

19 Tænastupløggini, til at gera tænastu í tí heilaga *plássinum,* tey heilagu klæðini til Aarons prests, og klæðini hjá sonum hansara, til at tæna í prests-embætinum.

20 ¶ Og øll samkoma Ísraels barna fór avstað frá nærveru Mósesar.

21 Og teir komu, hvør tann, hvørs hjarta vakti hann upp, og hvør tann, sum hansara andi gjørdi viljugan, *og* teir komu við HARRANS ofri til verk samkomutabernakkulsins, og til alla tænastu hans, og til tey heilagu klæðini.

22 Og tey komu, bæði menn og kvinnur, so mong sum vóru fúshjartaði, *og* komu við armbondum, og oyrnaringum, og ringum, og *prýðis*plátum, øllum smúkkum av gulli: og hvør maður, sum ofraði, *ofraði* eitt offur av gulli at HARRANUM.

23 Og hvør maður, hjá hvørjum varð funnið blátt, og purpur, og skarlaks*reytt,* og fínt lín, og geita*hár,* og reyð skinn av veðrum, og grevlingaskinn˘, kom við *teimum.*

24 Hvør tann, sum ofraði eitt offur av silvuri og messing, kom við HARRANS ofri: og hvør maður, hjá hvørjum varð funnin sjít´-tím viður til nakað arbeiði av tænastuni, kom við *tí.*

25 Og allar kvinnurnar, sum vóru víshjartaðar, spunnu við sínum hondum, og komu við tí sum tær høvdu spunnið, *bæði* av bláum, og av purpur*littum, og* av skarlaks*reyðum,* og av fínum líni.
26 Og allar kvinnurnar, hvørs hjarta vakti tær upp í vísdómi, spunnu geita*hár*.
27 Og stjórnararnir komu við ónyks steinum, og steinum til at verða settir, til ê-phōd´-una, og til bróstskjøldurin;
28 Og kryddaríi, og olju til ljósið, og til salvingar-oljuna, og til tað søta roykilsið.
29 Ísraels børn komu við einum viljugum ofri at HARRANUM, hvør maður og kvinna, hvørs hjarta gjørdi tey viljug at bera til alskyns verk, sum HARRIN hevði boðið at verða gjørt við^ hendi Móse.
30 ¶ Og Móses segði við børn Ísraels, Síggið, HARRIN hevur kallað við^ navni Bĕz-á´-lēēl Ū´-rī-s son, Hūrs son, av ættargrein Judah;
31 Og hann hevur fylt hann við anda Guðs, í vísdómi, í skili, og í kunnleika, og í alskyns handverki;
32 Og at upphugsa kynstrilig verk, at virka í gulli, og í silvuri, og í messing,
33 Og í skeringini av steinum, at seta *teir,* og í telging av træi, at gera hvørt háttarlag av hegnigum verki.
34 Og hann hevur lagt í hansara hjarta, at hann kann frálæra, *bæði* hann, og Ă-hó´-lī-ăb, sonur Ă-hĭs´-ă-măch-s, av ættargrein Dáns.
35 Teir hevur hann fylt við hjarta-vísdómi, at virka alskyns verk, hjá íristaranum, hjá tí hegniga verkamanninum, og hjá skreytseymaranum, í bláum, og í purpuri, í skarlaks*reyðum,* og í fínum líni, og hjá vevaranum, *enntá* hjá teimum sum gera nakað verk, og hjá teimum sum upphugsa hegnis*ligt* verk.

KAPITUL 36

SO arbeiddu Bĕz-á´-lēēl og Ă-hó´-lī-ăb, og hvør víshjartaður maður, í hvønn HARRIN legði vísdóm og skil til at vita hvussu virka *eigur* alskyns arbeiði til tænastu halgidómsins, samsvarandi við alt sum HARRIN hevði boðið.
2 Og Móses kallaði Bĕz-á´-lēēl og Ă-hó´-lī-ăb, og hvønn víshjartaðan mann, í hvørs hjarta HARRIN hevði lagt vísdóm, *enntá* hvønn tann, hvørs hjarta vakti hann upp til at koma at verkinum at gera tað:
3 Og teir móttóku av Mósesi alt ofrið, sum Ísraels børn vóru komnir við til arbeiðið av tænastu halgidómsins, til at gera hann *við*. Og tey førdu enn at honum frí offur hvønn morgun.
4 Og allir teir vísu menninir, sum virkaðu alt verk halgidómsins, komu hvør maður frá sínum arbeiði sum teir gjørdu;
5 ¶ Og teir talaðu við Móses, sigandi, Fólkið kemur við nógv meir enn nokk til tænastu arbeiðsins, sum HARRIN beyð at gera.
6 Og Móses gav ábjóðing, og teir fingu tað at verða kunngjørt út gjøgnum leirin, sigandi, Lat hvørki mann ella kvinnu gera nakað meira arbeiði til offur halgidómsins. So fólkið varð hildið aftur frá at bera.
7 Tí at tilfarið, *sum* teir høvdu, var nóg mikið til alt arbeiðið at gera tað, og ov mikið.
8 ¶ Og hvør víshjartaður maður teirra millum, sum virkaði verk tabernakkulsins, gjørdi tíggju dúkar *av* fínum tvinnaðum líni, og bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum: við* chêr-ū-bĭm´-um av hegnigum verki gjørdi hann teir.
9 Longdin á ēinum dúki *var* tjúgu og átta alnir, og breiddin á ēinum dúki fýra alnir: dúkarnir *vóru* allir av ēinari stødd.
10 Og hann koplaði teir fimm

dúkarnar ēin at øðrum: og *hīnar* fimm dúkarnar koplaði hann ēin at øðrum.

11 Og hann gjørdi lykkjur av bláum á rondina á ēinum dúki frá eggjarkantinum í koplingini: líkaleiðis gjørdi hann í tí ytstu síðuni á *einum øðrum* dúki, í koplingini á hinum øðrum.

12 Fimti lykkjur gjørdi hann í ēinum dúki, og fimti lykkjur gjørdi hann í kantinum á dúkinum sum *var* í koplingini á hinum øðrum: lykkjurnar hildu ēin *dúk* til ein annan.

13 Og hann gjørdi fimti krókar av gulli, og koplaði dúkarnar ēin at øðrum við krókunum: soleiðis gjørdist tað ēitt tabernakkul.

14 ¶ Og hann gjørdi dúkar *av* geita*hári* til tjaldið yvir tabernaklið: ellivu dúkar gjørdi hann teir.

15 Longdin á ēinum dúki *var* tríati alnir, og fýra alnir *var* breiddin á ēinum dúki: teir ellivu dúkarnir *vóru* av ēinari støddd.

16 Og hann koplaði fimm dúkar fyri seg sjálvar, og seks dúkar fyri seg sjálvar.

17 Og hann gjørdi fimti lykkjur uppá hin ytsta kantin á dúkinum í koplingini, og fimti lykkjur gjørdi hann uppá kantin á dúkinum sum koplar hin annan.

18 Og hann gjørdi fimti krókar *av* messing til at kopla tjaldið saman, at tað mátti verða ēitt.

19 Og hann gjørdi eina dekking til tjaldið *av* veðraskinnum litaðum reyðum, og eina dekking *av* grevlingaskinnum uppiyvir *tí*.

20 ¶ Og hann gjørdi *tilju*borð˘ til tabernaklið *av* sjīt´-tīm viði, *sum* stóðu uppi.

21 Longdin á einum borði *var* tíggju alnir, og breiddin á einum borði ēin alin og hálv.

22 Ēitt borð hevði tvær stellingar, javnligani fjarstaddar ēin frá eini aðrari: svá gjørdi hann til øll borðini av tabernaklinum.

23 Og hann gjørdi borð˘ til tabernaklið; tjúgu borð til suður síðuna suðureftir:

24 Og fjøruti soklar av silvuri gjørdi hann undir tey tjúgu borðini; tveir soklar undir ēitt borð til hans tvær stellingar, og tveir soklar undir eitt annað borð til hans tvær stellingar.

25 Og til hīna síðuna av tabernaklinum, *sum er* ímóti norður hjørninum, gjørdi hann tjúgu borð,

26 Og teirra fjøruti soklar av silvuri; tveir soklar undir ēitt borð, og tveir soklar undir eitt annað borð.

27 Og til síðurnar av tabernaklinum vestureftir gjørdi hann seks borð.

28 Og tvey borð gjørdi hann til hjørnini av tabernaklinum á teimum tveimum síðunum.

29 Og tey vóru koplaði í neðra, og koplaði saman við høvdið á tí, til ēin ring: svá gjørdi hann við bæði av teimum í báðum hjørnunum.

30 Og tað vóru átta borð; og teirra soklar *vóru* sekstan soklar av silvuri, undir hvørjum borði tveir soklar.

31 ¶ Og hann gjørdi tvørtrø av sjīt´-tīm viði; fimm til borðini á tí ēinu síðuni av tabernaklinum,

32 Og fimm tvørtrø til borðini á hīnari síðuni av tabernaklinum, og fimm tvørtrø til borðini av tabernaklinum til síðurnar vestureftir.

33 Og hann gjørdi mið-tvørtræið til at skjóta ígjøgnum borðini frá tí ēina endanum til hīn.

34 Og hann yvirklæddi borðini við gulli, og gjørdi teirra ringar *av* gulli *til at vera* støð til tvørtrøini, og yvirklæddi tvørtrøini við gulli.

35 ¶ Og hann gjørdi eitt forhang *av* bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum,* og finum tvinnað-

um líni: *við* chêr-û-bĭm´-um gjørdi hann tað av hegnigum verki.

36 Og hann gjørdi harat fýra stólpar *av* sjĭt´-tĭm *viði*, og yvirklæddi teir við gulli: teirra snatar *vóru av* gulli; og hann stoypti til teir fýra soklar av silvuri.

37 ¶ Og hann gjørdi eina tjaldváð til tabernakkuls-dyrnar *av* bláum, og purpuri, og skarlaks-*reyðum*, og finum tvinnaðum líni, av nálararbeiði;

38 Og teir fimm stólparnar hjá tí við teirra snatum: og hann yvirklæddi stólpahøvdini hjá teimum og ásløgini hjá teimum við gulli: men teirra fimm soklar *vóru av* messing.

KAPITUL 37

OG Bĕz-á´-lēel gjørdi ørkina *av* sjĭt´-tĭm viði: tvær alnir og hálv *var* longdin á henni, og ein alin og hálv breiddin á henni, og ein alin og hálv hæddin á henni:

2 Og hann yvirklæddi hana við skírum gulli innan og uttan, og gjørdi eina krúnu av gulli til hana runt umkring.

3 Og hann stoypti til hana fýra ringar av gulli, *at verða settar* við tey fýra hjørnini á henni; enntá tveir ringar uppá ta ēinu síðuna av henni, og tveir ringar uppá hīna síðuna av henni.

4 Og hann gjørdi stavir *av* sjĭt´-tĭm viði, og yvirklæddi teir við gulli.

5 Og hann setti stavirnar inn í ringarnar eftir síðunum á ørkini, til at bera ørkina.

6 ¶ Og hann gjørdi náðistólin *av* skírum gulli: tvær alnir og hálv *var* longdin á honum, og ēin alin og hálv breiddin á honum.

7 Og hann gjørdi tveir chêr-û-bĭm´-ar *av* gulli, slignar úr ēinum stykki gjørdi hann teir, á teir tveir endarnar av náðistólinum;

8 Ēin cherub á endan á hesari síðuni, og ein annan cherub á *hīn* endan á hasari síðuni: burtur úr náðistólinum gjørdi hann chêr-û-bĭm´-arnar á teir tveir endarnar av honum.

9 Og chêr-û-bĭm´-arnir breiddu út *sínar* veingir til hæddar, *og* dekkaðu við sínum veingjum yvir náðistólin, við sínum andlitum hvør móti øðrum; *enntá* mótvegis náðistólinum vóru andlitini á chêr-û-bĭm´-unum.

10 ¶ Og hann gjørdi borðið *av* sjĭt´-tĭm viði: tvær alnir *var* longdin á tí, og ein alin breiddin á tí, og ein alin og hálv hæddin á tí:

11 Og hann yvirklæddi tað við skírum gulli, og gjørdi harat eina krúnu av gulli runt umkring.

12 Hann eisini gjørdi harat eina brún á eina handbreidd runt umkring; og gjørdi eina krúnu av gulli til brúnina hjá tí runt umkring.

13 Og hann stoypti til tað fýra ringar av gulli, og setti ringarnar uppá tey fýra hjørnini sum *vóru* í teimum fýra beinunum hjá tí.

14 Yvir av brúnini vóru ringarnir, støðini til stavirnar at bera borðið.

15 Og hann gjørdi stavirnar *av* sjĭt´-tĭm viði, og yvirklæddi teir við gulli, til at bera borðið.

16 Og hann gjørdi íløtini sum *vóru* uppiá borðinum, føt hans, og sleivir hans, og skálir hans, og hansara skeinki*reiðir* til at skeinkja við, *av* skírum gulli.

17 ¶ Og hann gjørdi ljósastakan *av* skírum gulli: *av* slignum verki gjørdi hann ljósastakan; skaft hans, og grein hans, skálir hans, knappar hans, og blómur hans, vóru av hinum sama:

18 Og seks greinar, farandi út úr síðunum á honum; tríggjar greinar á ljósastakanum út úr tí ēinu síðuni á honum, og tríggjar greinar á ljósastakanum út úr hīnari síðuni á honum:

19 Tríggjar skálir, gjørdar eftir sniðinum á mandlum, á ēinari grein, ein knapp og eina blómu; og tríggjar skálir, gjørdar líkar mandlum, í eini aðrari grein, ein knapp og eina blómu: soleiðis út ígjøgnum tær seks greinarnar, farandi út úr ljósastakanum.

20 Og í ljósastakanum *vóru* fýra skálir, gjørdar líka *sum* mandlur, knappar hans, og blómur hans:

21 Og ein knappur undir tveimum greinum av tí sama, og ein knappur undir tveimum greinum av tí sama, og ein knappur undir tveimum greinum av tí sama, samsvarandi við tær seks greinarnar, farandi út úr honum.

22 Teirra knappar og teirra greinar vóru av tí sama: alt samalt *var* ēitt sligið verk *av* skírum gulli.

23 Og hann gjørdi hansara sjey lampur, og hansara *veik*tengur, og hansara skarpannur, *av* skírum gulli.

24 *Av* einari talent av skírum gulli gjørdi hann hann, og øll reiðir hansara.

25 ¶ Og hann gjørdi roykilsis-altarið *av* sjīt´-tīm viði: longdin á tí *var* ein alin, og breiddin á tí ein alin; *tað var* fýrkantað; og tvær alnir *var* hæddin á tí; hornini hjá tí vóru av hinum sama.

26 Og hann yvirklæddi tað við skírum gulli, *bæði* toppin á tí, og síðurnar á tí runt íkring, og hornini hjá tí: hann eisini gjørdi tí eina krúnu av gulli runt íkring.

27 Og hann gjørdi tveir ringar av gulli til tað undir krúnuna hjá tí, við tey tvey hjørnini á tí, uppiá teimum tveimum síðunum av tí, til at vera støð til stavirnar at bera tað við.

28 Og hann gjørdi stavirnar *av* sjīt´-tīm viði, og yvirklæddi teir við gulli.

29 ¶ Og hann gjørdi hina heilagu salvingar-olju, og tað skíra roykilsið av søtum kryddurtum, samsvarandi við apotekarans arbeiði.

KAPITUL 38

OG hann gjørdi brennioffurs-altarið *av* sjīt´-tīm viði: fimm alnir *var* longdin á tí, og fimm alnir breiddin á tí; *tað var* fýrkantað; og tríggjar alnir hæddin á tí.

2 Og hann gjørdi hornini hjá tí á tey fýra hjørnini á tí; hornini hjá tí vóru av tí sama: og hann yvirklæddi tað við messing.

3 Og hann gjørdi øll reiðini hjá altarinum, pottarnar, og skuplurnar, og kørini, *og* kjøtkrókarnar, og eldpannurnar: øll reiðini hjá tí gjørdi hann *av* messing.

4 Og hann gjørdi til altarið eina messing rimaverks-grind undir umgirðingina á tí í neðra at miðjuni av tí.

5 Og hann stoypti fýra ringar til teir fýra endarnar á grindini av messing, *at vera* støð til stavirnar.

6 Og hann gjørdi stavirnar *av* sjīt´-tīm viði, og yvirklæddi teir við messing.

7 Og hann koyrdi stavirnar inn í ringarnar á síðunum av altarinum, til at bera tað við; hann gjørdi altarið innanopið við borðum.

8 ¶ Og hann gjørdi tváttarkerið *av* messing, og fótin á tí *av* messing, av skoðiglarunum hjá *kvinnunum* savnandi, sum savnaðust *við* dyrnar á samkomutabernaklinum.

9 ¶ Og hann gjørdi forgarðin: á suður síðuni suðureftir *vóru* tjaldváðirnar av forgarðinum *av* fínum tvinnaðum líni, eitt hundrað alnir:

10 Teirra stólpar *vóru* tjúgu, og teirra messing soklar tjúgu; krókarnir av stólpunum og ásløgini hjá teimum *vóru av* silvuri.

11 Og til norður síðuna *vóru*

tjaldváðirnar eitt hundrað alnir, teirra stólpar *vóru* tjúgu, og teirra soklar av messing tjúgu; krókarnir av stólpunum og teirra ásløg *av* silvuri.

12 Og til vestur síðuna *vóru* tjaldváðir á fimti alnir, teirra stólpar tíggju, og teirra soklar tíggju; krókarnir av stólpunum og teirra ásløg *av* silvuri.

13 Og til eystur síðuna eystureftir fimti alnir.

14 Tjaldváðirnar av tí ēinu síðuni *av portrinum vóru* fimtan alnir; teirra stólpar tríggir, og teirra soklar tríggir.

15 Og til hīna síðuna á forgarðsportrinum, við hesa hondina og við hasa hondina, *vóru* tjaldváðir á fimtan alnir; teirra stólpar tríggir, og teirra soklar tríggir.

16 Allar tjaldváðirnar av forgarðinum runt íkring *vóru* av fínum tvinnaðum líni.

17 Og soklarnir til stólparnar *vóru av* messing; krókarnir av stólpunum og teirra ásløg *av* silvuri; og yvirklæðingin av teirra stólpahøvdum *av* silvuri; og allir stólparnir av forgarðinum *fingu* ásløg við silvuri.

18 Og tjaldváðin til portrið av forgarðinum *var* nálararbeiði, *av* bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum,* og fínum tvinnaðum líni: og tjúgu alnir *var* longdin, og hæddin í breiddini *var* fimm alnir, svariligt til tjaldváðirnar av forgarðinum.

19 Og teirra stólpar *vóru* fýra, og teirra soklar *av* messing fýra; teirra krókar *av* silvuri, og yvirklæðingin av teirra stólpahøvdum og teirra ásløg *av* silvuri.

20 Og allir hælirnir hjá tabernaklinum, og hjá forgarðinum runt umkring, *vóru av* messing.

21 ¶ Hetta er samanteljingin av tabernaklinum, *enntá* av vitnisburðar-tabernaklinum, sum tað varð talt, samsvarandi við ábjóðing Mósesar, *til* tænastuna hjá Levitunum, við hendi Ithʹ-ă-mâr-s, syni hjá Aaron presti.

22 Og Běz-áʹ-lēel Ūʹ-rī-s sonur, Hūrs sonar, av Judah ættargrein, gjørdi alt sum HARRIN skipaði Mósesi.

23 Og við honum *var* Ă-hóʹ-lī-ăb, sonur Ă-hīsʹ-ă-măch-s, av ættargrein Dáns, ein ígravari, og ein hegnigur arbeiðsmaður, og ein skreytseymari í bláum, og í purpuri, og í skarlaks*reyðum,* og í fínum líni.

24 Alt gullið sum var handhavt til arbeiðið í øllum arbeiðinum hjá hinum heilaga *plássinum,* enntá gullið av ofrinum, var tjúgu og níggju talentir, og sjey hundrað og tríati sjēʹ-kl-ar, eftir sjēʹ-kl-inum hjá halgidóminum.

25 Og silvurið av teimum sum vórðu upptaldir av samkomuni, *var* eitt hundrað talentir, og eitt túsund *og* sjey hundrað og trísinstjúgu og fimtan sjēʹ-kl-ar, eftir sjēʹ-kl-inum hjá halgidóminum:

26 Ein bēʹ-kâh til hvønn mann, *tað er,* hálvan sjēʹ-kūl, eftir sjēʹ-kl-inum hjá halgidóminum, til hvønn tann sum fór at verða upptaldur, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, fyri seks hundrað túsund og trý túsund og fimm hundrað og fimti *menn.*

27 Og av teimum hundrað talentunum av silvuri vórðu stoyptir soklarnir hjá halgidóminum, og soklarnir hjá forhanginum; eitt hundrað soklar av teimum hundrað talentunum, ein talent til ein sokkul.

28 Og av teimum túsund *og* sjey hundrað *og* sjeyti og fimm *sjēʹ-kl-unum* gjørdi hann krókar til stólparnar, og yvirklæddi stólpahøvdini hjá teimum, og *gjørdi* ásløg *til* teirra.

29 Og messingurin av ofrinum *var* sjeyti talentir, og tvey túsund og fýra hundrað sjēʹ-kl-ar.

30 Og við tí gjørdi hann soklarnar til hurðina hjá samkomutabernaklinum, og messing altarið, og messing grindina til tað, og øll reiðini av altarinum,
31 Og soklarnar av forgarðinum runt umkring, og soklarnar av forgarðs-portrinum, og allar hælirnar hjá tabernaklinum, og allar hælirnar hjá forgarðinum runt umkring.

KAPITUL 39

OG av tí bláa, og purpurinum, og skarlaks*reyða,* gjørdu teir tænastupløgg, til at gera tænastu í tí heilaga *plássinum,* og gjørdu hini heilagu klæðini til Aarons; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
2 Og hann gjørdi ê-phōd´-una *av* gulli, bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum,* og fínum tvinnaðum líni.
3 Og teir slógu gullið í tunnar plátur, og skóru *tað í* strengur, til at virka *tað* í tað bláa, og í purpurið, og í tað skarlaks*reyða,* og í tað fína línið, *við* hegnigum verki.
4 Teir gjørdu akslastykkir til hana, til at kopla *hana* saman: við teir tveir kantarnar varð hon koplað saman.
5 Og hin kynstriligi gyrðilin av ê-phōd´-u hennara, sum *var* uppiá henni, *var* av tí sama, samsvarandi við arbeiðið av tí; *av* gulli, bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum,* og fínum tvinnaðum líni; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
6 ¶ Og teir virkaðu ónyks steinar, innslúsaðar í groypingar av gulli, ristar, sum signettir verða ristar, við nøvnunum hjá børnum Ísraels.
7 Og hann setti teir á akslarnar av ê-phōd´-uni, *at teir skuldu vera* steinar til eina áminning hjá børnum Ísraels; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
8 ¶ Og hann gjørdi bróstskjøldurin *av* hegnigum verki, líka *sum* verkið hjá ê-phōd´-uni; *av* gulli, bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum,* og fínum tvinnaðum líni.
9 Hann var fýrkantaður; teir gjørdu bróstskjøldurin tvífaldan: ein sponn *var* longdin á honum, og ein sponn breiddin á honum, *verandi* tvífaldaður.
10 Og teir settu í hann fýra røðir av steinum: *hin fyrsta* røðin *var* ein sardis, ein tōpaz, og ein karfunkul: hetta *var* hin fyrsta røðin.
11 Og hin onnur røðin, ein smaragdur, ein sapphīrur, og ein diamantur.
12 Og hin triðja røðin, ein ligūr, ein agāt, og ein ámetýst.
13 Og hin fjórða røðin, ein beryllur, ein ónyks, og ein jaspis: *teir vóru* innslúsaðir í groypingar av gulli í innslúsingum sínum.
14 Og steinarnir *vóru* samsvarandi við nøvnini hjá Ísraels børnum, tólv, samsvarandi við teirra nøvn, *líkt við* íristingarnar hjá eini signett, hvør *og* ēin við sínum navni, samsvarandi við tær tólv ættargreinarnar.
15 Og teir gjørdu uppá bróstskjøldurin ketur við endarnar, *av* snúraðum verki *av* skírum gulli.
16 Og teir gjørdu tvær groypingar *av* gulli, og tveir gullringar; og settu teir tveir ringarnar í teir tveir endarnar av bróstskjøldrinum.
17 Og teir settu tær tvær snúraðu keturnar av gulli í teir tveir ringarnar á endunum av bróstskjøldrinum.
18 Og teir tveir endarnar á teimum tveimum ketunum festu teir í tær tvær groypingarnar, og settu tær á akslastykkini hjá ê-phōd´-uni, frammanvert *á* henni.
19 Og teir gjørdu tveir ringar av gulli, og settu *teir* í teir tveir endarnar av bróstskjøldrinum, uppá líningarnar av honum, sum *var* á síðuni av ê-phōd´-uni inneftir.
20 Og teir gjørdu tveir *aðrar* gullringar, og settu teir á tær tvær síð-

urnar av ê-phōd´-uni í neðra, ímóti frampartinum av henni, yvir av *hīnari* koplingini hjá henni, omanvert *við* hin kynstriliga gyrðilin hjá ê-phōd´-uni.

21 Og teir bundu bróstskjøldurin eftir hansara ringum at ringunum hjá ê-phōd´-uni við einum festi av bláum, at hann mátti vera omanvert *við* hin kynstriliga gyrðilin hjá ê-phōd´-uni; og at bróstskjøldurin mátti ei verða loystur frá ê-phōd´-uni; eins og HARRIN skipaði Mósesi.

22 ¶ Og hann gjørdi skikkjuna hjá ê-phōd´-uni *av* vovnum verki, alt *av* bláum.

23 Og *har var* eitt hol í miðjuni av skikkjuni, sum holið á eini bróstbrynju, *við* einum borda rundan um holið, at tað skuldi ikki skrædna.

24 Og teir gjørdu uppá faldarnar á skikkjuni granateplir *av* bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum, og* tvinnaðum *líni*.

25 Og teir gjørdu bjøllur *av* skírum gulli, og settu bjøllurnar ímillum granateplini uppá faldin á skikkjuni, rundan um ímillum granateplini;

26 Ein bjølla og eitt granatepli, ein bjølla og eitt granatepli, rundan um faldin á skikkjuni til at tæna *í;* eins og HARRIN skipaði Mósesi.

27 ¶ Og teir gjørdu kyrtlar *av* fínum líni *av* vovnum verki til Aaron, og til synir hansara,

28 Og eina vavhúgvu *av* fínum líni, og glæsiligar høvuðbúnar *av* fínum líni, og línbrøkur *av* fínum tvinnaðum líni,

29 Og ein gyrðil *av* fínum tvinnaðum líni, og bláum, og purpuri, og skarlaks*reyðum, av* nálararbeiði; eins og HARRIN skipaði Mósesi.

30 ¶ Og teir gjørdu plátuna av tí heilagu krúnuni *av* skírum gulli, og skrivaðu uppá hana eina skrift, *líkt við* íristingarnar hjá eini signett, HEILAGLEIKI TIL HARRANS.

31 Og teir bundu at henni eitt festi av bláum, til at festa *hana* til hæddar uppá vavhúgvuna; eins og HARRIN skipaði Mósesi.

32 ¶ Svá varð alt verkið av samkomutjalds-tabernaklinum fullført: og Ísraels børn gjørdu samsvarandi við alt sum HARRIN skipaði Mósesi, soleiðis gjørdu teir.

33 ¶ Og teir førdu tabernaklið at Mósesi, tjaldið, og allan útbúnaðin hjá tí, krókarnar hjá tí, *tilju*borðini hjá tí, tvørtrøini hjá tí, og stólparnar hjá tí, og soklarnar hjá tí,

34 Og dekkingina av veðraskinnum litaðum reyðum, og dekkingina av grevlingaskinnum, og fortjaldið av dekkingini,

35 Vitnisburðar-ørkina, og stavirnar hjá henni, og náðistólin,

36 Borðið, *og* øll reiðini hjá tí, og sýnisbreyðið,

37 Tann skíra ljósastakan, *við* lompunum hjá honum, *enntá við* lompunum at verða settar til rættis, og øll reiðini hjá honum, og oljuna til ljós,

38 Og hitt gylta altarið, og salvingar-oljuna, og tað søta roykilsið, og tjaldváðina til tabernakkuls hurðina,

39 Messing altarið, og rist hans av messing, stavir hans, og øll reiðir hans, tváttarkerið og fót hans,

40 Tjaldváðir forgarðsins, stólpar hans, og soklar hans, og tjaldváðina til forgarðs-portrið, bond hans, og hælir hans, og øll reiðini av tænastuni hjá tabernaklinum, til samkomu-tjaldið,

41 Tænastupløggini at gera tænastu í tí heilaga *plássinum,* og tey heilagu klæðini til Aarons prests, og klæðini hjá sonum hansara, til at tæna í prests-embætinum.

42 Samsvarandi við alt sum HARRIN skipaði Mósesi, soleiðis gjørdu Ísraels børn alt arbeiðið.

43 Og Móses hugdi uppá alt arbeiðið, og sí, teir høvdu gjørt tað eins og HARRIN hevði boðið, enntá soleiðis høvdu teir gjørt tað: og Móses vælsignaði teir.

KAPITUL 40

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Á hinum fyrsta degi hins fyrsta mánaðar skalt tú seta upp samkomutjalds-tabernaklið.

3 Og tú skalt seta harinn vitnisburðar-ørkina, og dekka ørkina við forhanginum.

4 Og tú skalt føra inn borðið, og seta til rættis tingini, sum eiga at verða sett til rættis, uppá tað; og tú skalt føra inn ljósastakan, og kveikja lampur hans.

5 Og tú skalt seta gull altarið til roykilsið frammanfyri vitnisburðar-ørkina, og seta tjaldváð hurðarinnar til tabernaklið.

6 Og tú skalt seta brennioffurs-altarið frammanfyri dyrnar á samkomutjalds-tabernaklinum.

7 Og tú skalt seta tváttarkerið ímillum savnaðartjaldið og altarið, og skalt koyra vatn harí.

8 Og tú skalt seta upp forgarðin runt umkring, og hanga upp tjaldváðina við forgarðs-portrið.

9 Og tú skalt taka salvingaroljuna, og salva tabernaklið, og alt sum *er* harí, og skalt halga tað, og øll reiðini hjá tí: og tað skal vera heilagt.

10 Og tú skalt salva brennioffurs-altarið, og øll reiðini hjá tí, og halga altarið: og tað skal vera eitt altar mest heilagt.

11 Og tú skalt salva tváttarkerið og fót hans, og halga tað.

12 Og tú skalt føra Aaron og hansara synir at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, og tváa teimum við vatni.

13 Og tú skalt koyra uppá Aaron tey heilagu klæðini, og salva hann, og halga hann; at hann má tæna at mær í prestsembætinum.

14 Og tú skalt koma við sonum hansara, og klæða teir við kyrtlum:

15 Og tú skalt salva teir, eins og tú salvaðirt faðir teirra, at teir mega tæna at mær í prests-embætinum: tí at teirra salving skal vissuliga vera eitt ævigtvarandi prestadømi út gjøgnum ættir teirra.

16 Svá gjørdi Móses: samsvarandi við alt sum HARRIN ábjóðaði honum, soleiðis gjørdi hann.

17 ¶ Og tað bar á í tí fyrsta mánaðinum í øðrum árinum, á hinum fyrsta *degi* mánaðarins, *at* tabernaklið varð reist upp.

18 Og Móses reisti upp tabernaklið, og festi soklar hans, og setti upp *tilju*borðini harav, og setti inn tvørtrøini harav, og reisti upp stólpar hans.

19 Og hann breiddi útum tjaldið yvir tabernaklið, og setti tjalds-dekkingina uppiyvir uppá tað; eins og HARRIN skipaði Mósesi.

20 ¶ Og hann tók og setti vitnisburðin inn í ørkina, og setti stavirnar á ørkina, og setti náðistólin uppiyvir uppá ørkina:

21 Og hann førdi ørkina inn í tabernaklið, og setti upp dekkingar-forhangið, og dekkaði vitnisburðar-ørkina; eins og HARRIN skipaði Mósesi.

22 ¶ Og hann setti borðið í samkomu-tjaldið, á síðuna av tabernaklinum norðureftir, uttanfyri forhangið.

23 Og hann setti breyðið til rættis uppá tað frammi fyri HARRANUM; eins og HARRIN hevði boðið Mósesi.

24 ¶ Og hann setti ljósastakan í samkomu-tjaldið, yvir av borðinum, á síðuna av tabernaklinum sunnanvert.

25 Og hann kveikti lampurnar frammi fyri HARRANUM; eins og HARRIN skipaði Mósesi.

26 ¶ Og hann setti hitt gylta altar í samkomu-tjaldið frammanfyri forhangið:
27 Og hann brendi søtt roykilsi harà; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
28 ¶ Og hann setti upp tjaldváðina *við* dyrnar á tabernaklinum.
29 Og hann setti brennioffursaltarið *við* dyrnar á samkomutjalds-tabernaklinum, og ofraði uppiá tí brenniofrið og matofrið; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
30 ¶ Og hann setti tváttarkerið ímillum samkomu-tjaldið og altarið, og koyrdi vatn har, til at tváa *við*.
31 Og Móses og Aaron og hansara synir tváaðu sínar hendur og sínar føtur harhjá:
32 Tá ið teir fóru inn í samkomu-tjaldið, og tá ið teir komu nær at altarinum, tvógu teir *sær;* eins og HARRIN skipaði Mósesi.
33 Og hann reisti upp forgarðin rundan um tabernaklið og altarið, og setti upp tjaldváðina av forgarðs-portrinum. So Móses fullgjørdi verkið.
34 ¶ Tá huldi eitt skýggj samkomu-tjaldið, og dýrd HARRANS fylti tabernaklið.
35 Og Móses var ikki førur fyri at innfara inn í samkomu-tjaldið, av tí at skýggið varð *verandi* harà, og dýrd HARRANS fylti tabernaklið.
36 Og tá ið skýggið varð tikið upp frá *at vera* yvir tabernaklinum, fóru Ísraels børn áfram á øllum ferðum sínum:
37 Men um skýggið varð ikki tikið upp, tá ferðaðust teir ikki til tann dag ið tað varð tikið upp.
38 Tí at skýggj HARRANS *var* uppiá tabernaklinum um dag*in,* og eldur var á tí um nátt*ina,* í eygsjónini á øllum húsi Ísraels, út gjøgnum allar ferðir teirra.

HIN TRIÐJA BÓK MÓSESAR,
KALLAÐ
LEVITICUS.

KAPITUL 1

OG HARRIN kallaði á Móses, og talaði við hann úr samkomu-tabernaklinum, sigandi,
2 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Um nakar maður av tykkum føri eitt offur at HARRANUM, tit skulu føra tykkara offur av fenaðinum, *enntá* av stórfæafylginum, og av smáfæafylginum.
3 Um hans offur *veri* eitt brennioffur av stórfæafylginum, lat hann ofra eitt kallkyns uttan lýti: hann skal ofra tað av sínum egna frívilliga vilja við dyrnar á samkomu-tabernaklinum frammi fyri HARRANUM.
4 Og hann skal leggja sína hond uppá høvdið á brenniofrinum; og tað skal verða góðtikið fyri hann til at gera sáttargerð fyri hann.
5 Og hann skal drepa ungtarvin frammi fyri HARRANUM: og prestarnir, synirnir hjá Aaroni, skulu koma við blóðinum, og sletta blóðið runt umkring uppá altarið sum *er við* dyrnar á samkomutabernaklinum.
6 Og hann skal fletta brenniofrið, og skera tað í stykkir hans.
7 Og synirnir hjá Aaroni presti skulu koyra eld uppá altarið, og leggja viðin til rættis uppá eldin:
8 Og prestarnir, synirnir hjá Aaroni, skulu leggja partarnar, høvdið, og feittið, til rættis uppá

viðin, sum *er* á eldinum, sum *er* uppiá altarinum:
9 Men hans innvølir og hansara leggir skal hann tváa í vatni: og presturin skal brenna alt á altarinum, *til at vera* eitt brenni-offur, eitt offur gjørt viðˆ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM.
10 ¶ Og um hans offur *veri* av smáfæafylgjunum, *nevniliga,* av seyðunum, ella av geitunum, til eitt brenni-sláturoffur; *so* skal hann koma við tí eitt kallkyns uttan lýti.
11 Og hann skal drepa tað við síðuna av altarinum norðanvert frammi fyri HARRANUM: og prestarnir, synirnir hjá Aaroni, skulu sletta hansara blóð runt umkring uppá altarið.
12 Og hann skal skera tað í stykkir hans, við høvdi hans og feitti hans: og presturin skal leggja tey til rættis á viðin, sum *er* á eldinum, sum *er* uppiá altarinum:
13 Men hann skal tváa innvølirnar og leggirnar við vatni: og presturin skal koma við *tí* øllum, og brenna *tað* uppiá altarinum: tað *er* eitt brenni-sláturoffur, eitt offur gjørt viðˆ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM.
14 ¶ Og um brenni-sláturofrið fyri hans offur til HARRANS *veri* av fuglum, so skal hann koma við sínum ofri av turtildúgvum, ella av ungum dúgvum.
15 Og presturin skal koma við tí at altarinum, og vinda av høvur hans, og brenna *tað* á altarinum; og blóðið harav skal verða vundið út við síðuna av altarinum:
16 Og hann skal slíta burtur kjós hans við fjaðrum hans, og kasta tað við síðuna av altarið á eystara partin, við plássið hjá øskunum:
17 Og hann skal klúgva hann við veingjum hans, *men* skal ikki skilja *hann* sundur: og presturin skal brenna hann uppiá altarinum, uppiá viðinum sum *er* uppiá eldinum: tað *er* eitt brenni-sláturoffur, eitt offur gjørt viðˆ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM.

KAPITUL 2

OG tá ið onkur vil ofra eitt matoffur at HARRANUM, hans offur skal vera *av* fínum mjøli; og hann skal hella olju uppá tað, og koyra roykilsi hará:
2 Og hann skal koma við tí til sona Aarons, prestanna: og hann skal taka harúr sín fulla lógva av fínum mjøli harav, og av oljuni harav; við øllum roykilsinum harav; og presturin skal brenna minnið av tí uppiá altarinum, *til at vera* eitt offur gjørt viðˆ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM:
3 Og leivdin av matofrinum *skal vera* Aarons og sona hans: *tað er* eitt ting mest heilagt av ofrum HARRANS gjørdum viðˆ eldi.
4 ¶ Og um tú komi við einum tilbiðjanar-ofri av einum matofri bakaðum í ovninum, *tað skal vera* ósúrgaðar køkur av fínum mjøli blandað við olju, ella ósúrgaðar flatkøkur salvaðar við olju.
5 ¶ Og um títt tilbiðjanar-offur *veri* eitt matoffur *bakað* í eini pannu, tað skal vera *av* fínum mjøli ósúrgað, blandað við olju.
6 Tú skalt luta tað í stykkir, og hella olju hará: tað *er* eitt matoffur.
7 ¶ Og um títt tilbiðjanar-offur *veri* eitt matoffur, *bakað* í steikipannuni, tað skal verða gjørt *av* fínum mjøli við olju.
8 Og tú skalt koma við matofrinum sum er gjørt av hesum tingunum at HARRANUM: og tá ið tað er framsett prestinum, skal hann koma við tí at altarinum.
9 Og presturin skal taka frá matofrinum eitt minni harav, og skal brenna *tað* uppiá altarinum: *tað*

er eitt offur gjørt við^ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM.

10 Og tað, sum er eftir av matofrinum, *skal vera* Aarons og sona hans: *tað er* eitt ting mest heilagt av ofrum HARRANS gjørdum við^ eldi.

11 Einkið matoffur, sum tit skulu koma við at HARRANUM, skal verða gjørt við súrdeiggi: tí at tit skulu einkið súrdeiggj brenna, ella nakran hunang, í nøkrum ofri HARRANS gjørdum við^ eldi.

12 ¶ Hvat viðvíkur tilbiðjanarofrinum av frumávøkstunum, tit skulu ofra tey at HARRANUM: men tey skulu ikki verða brend á altarinum til ein søtan anga.

13 Og hvørt tilbiðjanar-offur av tínum matofri skalt tú krydda við salti; eiheldur skalt tú loyva salti sáttmála Guðs tíns at vera vantandi frá tínum matofri: við øllum tínum ofrum skalt tú ofra salt.

14 Og um tú ofri eitt matoffur av tínum frumávøkstum at HARRANUM, skalt tú ofra til matofrið av tínum frumávøkstum grøn øks av korni, turkað við eldin, *enntá* korn, sligið út úr fullum øksum.

15 Og tú skalt koyra olju uppá tað, og leggja roykilsi hará: tað *er* eitt matoffur.

16 Og presturin skal brenna minnið av tí, *part* av tí sligna korninum harav, og *part* av oljuni harav, við øllum roykilsinum harav: *tað er* eitt offur gjørt við^ eldi at HARRANUM.

KAPITUL 3

OG um hansara tilbiðjanaroffur *veri* eitt sláturoffur av friðofri, um hann ofri *tað* av stórfæafylginum, hvørt *tað veri* eitt kallkyns ella kvennkyns, hann skal ofra tað uttan lýti frammi fyri HARRANUM.

2 Og hann skal leggja sína hond uppá høvdið á sínum ofri, og drepa tað *við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum: og synirnir hjá Aaroni, prestarnir, skulu sletta blóðið uppá altarið runt umkring.

3 Og hann skal ofra av friðoffurssláturofrinum eitt offur gjørt við^ eldi at HARRANUM; feittið sum dekkar innvølirnar, og alt feittið sum *er* uppiá innvølunum,

4 Og tey tvey nýruni, og feittið sum *er* á teimum, sum *er* við síðurnar, og hinnuna uppiyvir livrini, við nýrunum, tað skal hann taka burtur.

5 Og synirnir hjá Aaroni skulu brenna tað á altarinum uppiá brenni-sláturofrinum, sum *er* uppiá viðinum sum *er* á eldinum: *tað er* eitt offur gjørt við^ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM.

6 ¶ Og um hans offur til eitt friðoffurs-sláturoffur at HARRANUM *veri* av smáfæafylginum; kallkyns ella kvennkyns, hann skal ofra tað uttan lýti.

7 Um hann ofri eitt lamb til sítt offur, so skal hann ofra tað frammi fyri HARRANUM.

8 Og hann skal leggja sína hond uppá høvdið á sínum ofri, og drepa tað frammanfyri samkomu-tabernaklinum: og synirnir hjá Aaroni skulu sletta blóðið harav runt umkring uppá altarið.

9 Og hann skal ofra av friðoffurs-sláturofrinum eitt offur gjørt við^ eldi at HARRANUM; feittið harav, *og* allan feithalan, tað skal hann taka av beint við halabeinið; og feittið sum dekkar innvølirnar, og alt feittið sum *er* uppiá innvølunum,

10 Og tey tvey nýruni, og feittið sum *er* uppiá teimum, sum *er* við síðurnar, og hinnuna uppiyvir livrini, við nýrunum, tað skal hann taka burtur.

11 Og presturin skal brenna tað uppiá altarinum: *tað er* maturin av ofrinum gjørdum við^ eldi at HARRANUM.

12 ¶ Og um hans offur *veri* ein geit, so skal hann ofra hana framfyri HARRAN.
13 Og hann skal leggja sína hond uppá høvdið á henni, og drepa hana frammanfyri samkomu-tabernaklinum: og synirnir hjá Aaroni skulu sletta blóðið harav uppá altarið runt umkring.
14 Og hann skal ofra harav sítt offur, *enntá* eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM; feittið sum dekkar innvølirnar, og alt feittið sum *er* uppiá innvølunum,
15 Og tey tvey nýruni, og feittið sum *er* uppiá teimum, sum *er* við síðurnar, og hinnuna uppiyvir livrini, við nýrunum, tað skal hann taka burtur.
16 Og presturin skal brenna tey uppiá altarinum: *tað er* maturin av ofrinum gjørdum við eldi til ein søtan anga: alt feittið *er* HARRANS.
17 *Tað skal vera* ein viðvarandi áseting hjá tykkara ættarliðum út gjøgnum allar bústaðir tykkara, at tit eti hvørki feitt ella blóð.

KAPITUL 4

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,
2 Tala við børn Ísraels, sigandi, Um ein sál skal synda gjøgnum fákunnu ímóti nøkrum av boðum HARRANS *viðvíkjandi tingum* sum áttu ikki at verðið gjørd, og skal gera ímóti nøkrum av teimum:
3 Um presturin, sum er salvaður, syndi samsvarandi við synd fólksins; so lat hann føra fyri sína synd, sum hann hevur syndað, ein ungan ungtarv uttan lýti at HARRANUM til eitt syndoffur.
4 Og hann skal koma við ungtarvinum at dyrnum á samkomutabernaklinum framfyri HARRAN; og skal leggja sína hond uppá høvdið á ungtarvinum, og drepa ungtarvin frammi fyri HARRANUM.
5 Og presturin, sum er salvaður, skal taka av blóðinum av ungtarvinum, og koma við tí til samkomu-tabernaklið:
6 Og presturin skal dyppa sín fingur í blóðið, og sletta av blóðinum sjey ferðir framfyri HARRAN, frammanfyri forhangið av halgidóminum.
7 Og presturin skal koyra *nakað* av blóðinum uppá hornini á søtroykilsis-altarinum frammi fyri HARRANUM, sum *er* í samkomutabernaklinum; og skal hella alt blóðið av ungtarvinum við botnin á brennioffurs-altarinum, sum *er við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum.
8 Og hann skal taka av frá tí alt feittið av ungtarvinum til syndofrið; feittið sum dekkar innvølirnar, og alt feittið sum *er* uppiá innvølunum,
9 Og tey tvey nýruni, og feittið sum *er* uppiá teimum, sum *er* við síðurnar, og hinnuna uppiyvir livrini, við nýrunum, tað skal hann taka burtur,
10 Eins og tað varð tikið av frá friðofra-sláturoffurs-ungtarvinum: og presturin skal brenna tey uppiá brennioffurs-altarinum.
11 Og húðina av ungtarvinum, og alt kjøt hans, við høvdi hans, og við leggjum hans, og innvølum hans, og skarni hans,
12 Enntá allan ungtarvin skal hann bera fram útum leirin at einum reinum plássi, har øskurnar verða heltar út, og brenna hann á viðinum við eldi: har, *sum* øskurnar verða heltar út, skal hann verða brendur.
13 ¶ Og um øll samkoma Ísraels syndi gjøgn fákunnu, og tingið veri *seg* fjalt frá eygum savnaðarins, og teir havi gjørt *eitthvørt ímóti* nøkrum av boðum HARRANS *viðvíkjandi tingum* sum skuldu ikki verðið gjørd, og eru sekir;
14 Tá ið syndin, sum teir hava syndað ímóti tí, er kunn, tá skal samkoman ofra ein ungan ungtarv

fyri syndina, og koma við honum framfyri samkomu-tabernaklið.

15 Og teir elstu av samkomuni skulu leggja sínar hendur uppá høvdið á ungtarvinum frammi fyri HARRANUM: og ungtarvurin skal verða dripin frammi fyri HARRANUM.

16 Og presturin, sum er salvaður, skal koma við av blóði ungtarvsins til samkomu-tabernaklið:

17 Og presturin skal dyppa sín fingur *í nakað* av blóðinum, og sletta *tað* sjey ferðir framfyri HARRAN, *enntá* frammanfyri forhangið.

18 Og hann skal koyra *nakað* av blóðinum uppá hornini á altarinum, sum *er* frammanfyri HARRANUM, sum *er* í samkomu-tabernaklinum, og skal hella út alt blóðið við botnin á brennioffurs-altarinum, sum *er við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum.

19 Og hann skal taka alt hansara feitt frá honum, og brenna *tað* uppiá altarinum.

20 Og hann skal gera við ungtarvin eins og hann gjørdi við ungtarvin til eitt syndoffur, soleiðis skal hann gera við hendan: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri teir, og tað skal verða fyrigivið teimum.

21 Og hann skal bera fram ungtarvin útum leirin, og brenna hann eins og hann brendi hin fyrsta ungtarvin: tað *er* eitt syndoffur fyri samkomuna.

22 ¶ Tá ið ein stjórnari hevur syndað, og gjørt *eitthvørt* gjøgn fákunnu *ímóti* nøkrum av boðum HARRANS Guðs síns *viðvíkjandi tingum* sum skuldu ikki verðið gjørd, og er sekur;

23 Ella um hansara synd, í hvørji hann hevur syndað, komi til hansara kunnleika; hann skal koma við sínum ofri, einum lambi av geitunum, einum kallkyns uttan lýti:

24 Og hann skal leggja sína hond uppá høvdið á geitini, og drepa hana á tí plássinum har teir drepa brenniofrið frammi fyri HARRANUM: tað *er* eitt syndoffur.

25 Og presturin skal taka av blóðinum av syndofrinum við sínum fingri, og koyra *tað* uppá hornini á brennioffurs-altarinum, og skal hella út hansara blóð við botnin á brennioffurs-altarinum.

26 Og hann skal brenna alt hansara feitt uppiá altarinum, eins og feittið av friðofrað-sláturofrinum: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann, hvat hansara synd viðvíkur, og tað skal verða fyrigivið honum.

27 ¶ Og um nakar av almúgufólkinum syndi gjøgn fákunnu, meðan hann ger *eitthvørt ímóti* nøkrum av boðum HARRANS *viðvíkjandi tingum* sum áttu ikki at verðið gjørd, og verði sekur;

28 Ella um hansara synd, sum hann hevur syndað, komi til hansara kunnleika: tá skal hann koma við sínum ofri, einum lambi av geitunum, einum kvennkyns uttan lýti, fyri sína synd sum hann hevur syndað.

29 Og hann skal leggja sína hond uppá høvdið á syndofrinum, og vega syndofrið á plássi brennioffursins.

30 Og presturin skal taka av blóðinum harav við sínum fingri, og koyra *tað* uppá hornini á brennioffurs-altarinum, og skal hella út alt blóðið harav við botnin á altarinum.

31 Og hann skal taka burtur alt feittið harav, eins og feittið verður tikið burtur uttan av friðofrað-sláturofrinum; og presturin skal brenna *tað* uppiá altarinum til ein søtan anga at HARRANUM; og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann, og tað skal verða fyrigivið honum.

32 Og um hann komi við einum lambi til eitt syndoffur, hann skal koma við tí eitt kvennkyns uttan lýti.
33 Og hann skal leggja sína hond uppá høvdið á syndofrinum, og vega tað til eitt syndoffur á tí plássinum har teir drepa brenniofrið.
34 Og presturin skal taka av blóðinum av syndofrinum við sínum fingri, og koyra *tað* uppá hornini á brennioffurs-altarinum, og skal hella út alt blóðið harav við botnin á altarinum:
35 Og hann skal taka burtur alt feittið harav, eins og feittið av lambinum verður tikið burtur frá friðofrať-sláturofrinum; og presturin skal brenna tey uppiá altarinum, samsvarandi við ofrini gjørd viðˆ eldi at HARRANUM: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hansara synd sum hann hevur framt, og hon skal verða fyrigivin honum.

KAPITUL 5

OG um ein sál syndi, og hoyri røddina á svørjing, og *er* eitt vitni, hvørt hann hevur sæð ella vitað *um tað;* um hann mæli *tað* ikki, tá skal hann bera sína misgerð.
2 Ella um ein sál nerti nakað óreint ting, hvørt *tað veri* eitt ræ av einum óreinum djóri, ella eitt ræ av óreinum fenaði, ella ræið av óreinum skriðkyktum, og *um* tað veri fjalt frá honum; hann eisini skal vera óreinur, og sekur.
3 Ella um hann nerti óreinleika mans, hvønnsumhelst óreinleika *tað veri seg* sum ein maður skal verða dálkaður við, og tað veri *seg* fjalt frá honum; tá ið hann veit *av tí,* tá skal hann vera sekur.
4 Ella um ein sál svørji, lýsandi við *sínum* vørrum at gera ilt, ella at gera gott, hvatsumhelst *tað veri seg* sum ein maður skal lýsa við einum eiði, og tað veri *seg* fjalt frá honum; tá ið hann veit *av tí,* tá skal hann vera sekur í ēinum av hesum.
5 Og tað skal verða, tá ið hann skal vera sekur í ēinum av hesum *tingunum,* at hann skal játta, at hann hevur syndað í tí *tinginum:*
6 Og hann skal koma við sínum misbrotsofri at HARRANUM fyri sína synd sum hann hevur syndað, einum kvennkyns úr smáfæafylginum, einum lambi ella einum lambi av geitunum, til eitt syndoffur; og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann viðvíkjandi hansara synd.
7 Og um hann veri ikki førur fyri at koma við einum lambi, so skal hann føra fyri sítt misbrot, sum hann hevur framt, tvær turtildúgvur, ella tvær ungar dúgvur, at HARRANUM; ēinari til eitt syndoffur, og hīnari til eitt brennioffur.
8 Og hann skal føra tær at prestinum, sum skal ofra *tað,* sum *er* til syndofrið, fyrst, og vinda av høvur hans frá hálsi hans, men skal ikki skilja *tað* sundur:
9 Og hann skal sletta av blóðinum av syndofrinum uppá síðuna á altarinum; og restin av blóðinum skal verða vundin út við botnin á altarinum: tað *er* eitt syndoffur.
10 Og hann skal ofra hina aðru *til* eitt brennioffur, samsvarandi við háttarlagið: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann fyri hansara synd sum hann hevur syndað, og tað skal verða fyrigivið honum.
11 ¶ Men um hann veri ikki førur fyri at koma við tveimum turtildúgvum, ella tveimum ungum dúgvum, so skal hann, sum syndaði, bera til sítt offur tíggjundarpartin av eini ē´-phūh av fínum mjøli til eitt syndoffur; hann skal onga olju koyra uppá

tað, eiheldur skal hann koyra *nakað* roykilsi hará: tí at tað *er* eitt syndoffur.

12 So skal hann koma við tí til prestin, og presturin skal taka sín fulla lógva av tí, *enntá* eitt minni av tí, og brenna *tað* á altarinum, samsvarandi við ofrini gjørd við^ eldi at HARRANUM: tað *er* eitt syndoffur.

13 Og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann, hvat viðvíkur hansara synd sum hann hevur syndað í ēinum av hesum, og hon skal verða fyrigivin honum: og *leivdin* skal vera prestsins, sum eitt matoffur.

14 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

15 Um ein sál fremji eitt misbrot, og syndi gjøgn fákunnu, í hinum heilagu tingum HARRANS, so skal hann føra fyri sítt misbrot at HARRANUM ein veðr uttan lýti úr smáfæafylgjunum, við tíni metan við^ sjḗ-kl-um av silvuri, eftir sjḗ-kl-i halgidómsins, til eitt misbrotsoffur:

16 Og hann skal gera skaðabøtur fyri skaðan sum hann hevur gjørt í tí heilaga tinginum, og skal leggja aftrat fimtapartin hartil, og geva tað at prestinum: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann við misgerðaroffurs-veðrinum, og tað skal verða fyrigivið honum.

17 ¶ Og um ein sál syndi, og fremji nakað av hesum tingunum sum eru forboðin at verða gjørd við^ boðunum hjá HARRANUM; hóast hann vitsti *tað* ikki, tó er hann sekur, og skal bera sína misgerð.

18 Og hann skal koma við einum veðri uttan lýti úr smáfæafylginum, við tíni metan, til eitt misbrotsoffur, at prestinum: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann viðvíkjandi hansara fákunnu, í hvørji hann fór skeivur og vitsti *tað* ikki, og tað skal verða fyrigivið honum.

19 Tað *er* eitt misbrotsoffur: hann hevur vissuligani misbrotist ímóti HARRANUM.

KAPITUL 6

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Um ein sál syndi, og fremji eitt misbrot ímóti HARRANUM, og ljúgvi at sínum næsta í tí sum varð fingið honum at varðveita, ella í samfelagi, ella í einum tingi tikið burtur við harðskapi, ella hevur svikið sín næsta,

3 Ella havi funnið tað sum varð burturmist, og lýgur viðvíkjandi tí, og svør falsliga; í nøkrum av øllum hesum sum ein maður ger, syndandi hará:

4 So skal tað verða, av tí at hann hevur syndað, og er sekur, at hann skal endurbøta tað sum hann tók harðskapsligani burtur, ella tað tingið sum hann hevur svikaliga skaffað, ella tað sum varð fingið honum at varðveita, ella tað burturmista tingið sum hann fann,

5 Ella alt tað, um hvørt hann hevur svorið falsliga; hann skal enntá endurbøta tað til fulnar, og skal leggja aftrat fimtapartin meira hartil, *og* geva tað at honum, til hvørs tað tilhoyrir, á deginum av sínum misbrotsofri.

6 Og hann skal koma við sínum misbrotsofri at HARRANUM, einum veðri uttan lýti úr smáfæafylginum, við tíni metan, til eitt misbrotsoffur, at prestinum:

7 Og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann frammi fyri HARRANUM: og tað skal verða fyrigivið honum fyri nakað ting av øllum sum hann hevur gjørt í at misbróta hará.

8 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

9 Bjóða Aaroni og hansara

sonum, sigandi, Hetta *er* lóg brennioffursins: Tað *er* brenniofrið, uppá grund av brenningini uppiá altarinum alla nátt at morgninum, og eldurin av altarinum skal vera brennandi í tí.

10 Og presturin skal fara í sítt línklæði, og sínar línbrøkur skal hann fara *í* uppá kjøt sítt, og taka upp øskurnar sum eldurin hevur upptært við brenniofrinum á altarinum, og hann skal koyra tær við síðuna av altarinum.

11 Og hann skal fara úr sínum klæðum, og fara í onnur klæðir, og bera fram øskurnar útum leirin at einum reinum plássi.

12 Og eldurin uppiá altarinum skal vera brennandi í honum; hann skal ei verða sløktur: og presturin skal brenna við˙ á tí hvønn morgun, og leggja brenniofrið til rættis uppiá tí; og hann skal brenna hará feittið av friðofrunum.

13 Eldurin skal ævir vera brennandi uppiá altarinum; hann skal aldri slókna.

14 ¶ Og hetta *er* lóg matoffursins: synirnir hjá Aaroni skulu ofra tað frammi fyri HARRANUM, frammanfyri altarið.

15 Og hann skal taka av tí sín fulla lógva, av mjølinum av matofrinum, og av oljuni harav, og alt roykilsið sum *er* uppiá matofrinum, og skal brenna *tað* uppiá altarinum *til* ein søtan anga, *enntá* minnið av tí, at HARRANUM.

16 Og hitt eftirverandi harav skulu Aaron og hansara synir eta: við ósúrgaðum breyði skal tað verða etið í tí heilaga plássinum; í forgarðinum av samkomutabernaklinum skulu teir eta tað.

17 Tað skal ikki verða bakað við súrdeiggi. Eg havi givið *teimum* tað *til* teirra skamt av mínum ofrum gjørdum við˙ eldi; tað *er* mest heilagt, eins og *er* syndofrið, og eins og misbrotsofrið.

18 Allir hannarnir millum Aarons barna skulu eta av tí. *Tað skal vera* ein áseting um ævir í ættarliðum tykkara viðvíkjandi ofrum HARRANS gjørdum við˙ eldi: hvør tann, sum nemur við tey, skal vera heilagur.

19 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

20 Hetta *er* ofrið hjá Aaroni og hjá hansara sonum, sum teir skulu ofra at HARRANUM á tí degi tá ið hann verður salvaður; tíggjundarpartin av eini ē´-phūh av fínum mjøli til eitt matoffur viðvarandi, helvtina av tí um morgunin, og helvtina harav um aftan.

21 Í eini pannu skal tað verða gjørt við olju; *og tá ið tað er* bakað, skalt tú koma við tí inn: *og* tey bakaðu stykkini av matofrinum skalt tú ofra *til* ein søtan anga at HARRANUM.

22 Og presturin av hansara sonum, sum verður salvaður í hansara stað, skal ofra tað: *tað er* ein áseting um ævir at HARRANUM; tað skal verða heil*veg*is brent.

23 Tí at hvørt *eitt* matoffur fyri prestin skal verða heil*veg*is brent: tað skal ei verða etið.

24 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

25 Tala við Aaron og til sona hansara, sigandi, Hetta *er* lóg syndoffursins: Á tí plássi, har brenniofrið verður dripið, skal syndofrið verða dripið frammi fyri HARRANUM: tað *er* mest heilagt.

26 Presturin, sum ofrar tað fyri synd, skal eta tað: í tí heilaga plássinum skal tað verða etið, í forgarðinum av samkomutabernaklinum.

27 Hvatsumhelst *ið* skal nema við kjøtið harav, skal vera heilagt: og tá ið tað verður slett av blóðinum harav uppá nakað klæði, skalt tú tváa tað, hvará tað varð slett, í tí heilaga plássinum.

28 Men leirkerið, hvarí tað verður soðið, skal verða brotið: og um tað verði soðið í eini messing grýtu, skal tað bæði verða skúrað, og reinsað í vatni.
29 Allir hannarnir prestanna millum skulu eta harav: tað *er* mest heilagt.
30 Og einkið syndoffur, hvarav *nakað* av blóðinum er ført inn í samkomu-tabernaklið til at endursóna *við* í tí heilaga *plássinum,* skal verða etið: tað skal verða brent í eldinum.

KAPITUL 7

SOMULEIÐIS *er* hetta lóg misbrotsoffursins: tað *er* mest heilagt.
2 Í tí plássinum, har teir drepa brenniofrið, skulu teir drepa misbrotsofrið: og blóðið harav skal hann sletta runt umkring uppá altarið.
3 Og hann skal ofra av tí alt feittið harav; feithalan, og feittið sum dekkar innvølirnar,
4 Og tey tvey nýruni, og feittið sum *er* á teimum, sum *er* við síðurnar, og hinnuna *sum er* uppiyvir livrini, við nýrunum, tað skal hann taka burtur:
5 Og presturin skal brenna tey uppiá altarinum *til* eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM: tað *er* eitt misbrotsoffur.
6 Hvør hannur prestanna millum skal eta harav: tað skal verða etið í tí heilaga plássinum: tað *er* mest heilagt.
7 Eins og syndofrið *er,* soleiðis *er* misbrotsofrið: *tað er* ein lóg fyri tey: presturin, sum ger sáttargerð harvið, skal hava *tað*.
8 Og tann presturin, sum ofrar brennioffur nakars mans, *enntá* tann presturin skal hava til sín sjálvs húðina av brenniofrinum sum hann hevur ofrað.
9 Og alt matofrið sum verður bakað í ovninum, og alt sum verður tilreitt í steikipannuni, og í pannuni, skal vera prestsins sum ofrar tað.
10 Og hvørt matoffur, blandað við olju, og turt, skulu allir synirnir hjá Aaroni hava, ein *eins nógv* sum ein annar.
11 Og hetta *er* lógin um friðofrað-sláturofrið, sum hann skal ofra at HARRANUM.
12 Um hann ofri tað til eina takkarveitan, so skal hann ofra við takkarveitanar-sláturofrinum ósúrgaðar køkur blandaðar við olju, og ósúrgaðar flatkøkur salvaðar við olju, og køkur blandaðar við olju, av fínum mjøli, steiktar.
13 Umframt køkurnar skal hann ofra *sum* sítt offur ósúrgað breyð við takkarveitanar-sláturofrinum av sínum friðofrum.
14 Og av tí skal hann ofra ein eitt úr øllum tilbiðjanar-ofrinum *til* eitt hevjioffur at HARRANUM, *og* tað skal vera prestsins sum slettir blóðið av friðofrunum.
15 Og kjøtið av hansara friðofrað-sláturofri til takkarveitan skal verða etið hin sama dagin sum tað verður ofrað; hann skal ikki eftirlata nakað av tí inntil morgunin.
16 Men um sláturofrið av ofri hansara *veri* eitt heiti, ella eitt fríviljugt offur, tað skal verða etið hin sama dagin sum hann ofrar sítt sláturoffur: og á morgindeginum skal eisini avlopið av tí verða etið:
17 Men avlopið av kjøtinum av sláturofrinum á hinum triðja degi skal verða brent við eldi.
18 Og um *nakað* av kjøtinum av hansara friðofrað-sláturofri verði etið yvirhøvur á hinum triðja degi, tað skal ei verða góðkent, eiheldur skal tað verða tilroknað honum sum ofrar tað: tað skal vera ein andstygd, og tann sál, sum etur av tí, skal bera sína misgerð.

19 Og tað kjøtið, sum nertur við nakað óreint *ting*, skal ikki verða etið; tað skal verða brent við eldi: og hvat kjøtinum viðvíkur, allir, sum veri *seg* reinir, skulu eta harav.

20 Men tann sál sum etur *av* kjøtinum av friðofraˇ-sláturofrinum, sum *tilhoyra* HARRANUM, havandi sína óreinsku uppiá sær, enntá handa sál skal verða skorin av frá fólki hans.

21 Haraftrat tann sálin sum skal nema við nakað óreint *ting, eins og* óreinleikan hjá manni, ella *nakað* óreint djór, ella nakað andstyggiligt óreint *ting*, og eta av kjøtinum av friðofraˇ-sláturofrinum sum *tilhoyra* HARRANUM, enntá handa sál skal verða skorin av frá fólki hans.

22 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

23 Tala við børn Ísraels, sigandi, Tit skulu eta einkið háttarlag av feitti, av oksa, ella av seyði, ella av geit.

24 Og feittið av djórinum sum doyr av sær sjálvum; og feittið av tí, sum verður skrætt við djórum, kann verða nýtt í nakrari aðrari nýtslu: men tit skulu á ongan vís eta av tí.

25 Tí at hvørsumhelst *ið* etur feittið av djórinum, av hvørjum menn ofra eitt offur gjørt viðˆ eldi at HARRANUM, enntá tann sál, sum etur *tað,* skal verða skorin av frá fólki hans.

26 Haraftrat, tit skulu eta einkið háttarlag av blóði, *hvørt tað veri* av fugli ella av djóri, í nøkrum av bústøðum tykkara.

27 Hvørsumhelst sál *ið tað veri seg,* sum etur nakað háttarlag av blóði, enntá handa sál skal verða skorin av frá fólki hans.

28 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

29 Tala við børn Ísraels, sigandi, Hann, sum ofrar sláturofrið av sínum friðofrum at HARRANUM, skal koma við sínum tilbiðjanar-ofri at HARRANUM av sláturofrinum av sínum friðofrum.

30 Hansara egnu hendur skulu koma við ofrum HARRANS gjørdum viðˆ eldi, feittinum við bringuni, tí skal hann koma við, *fyri* at bringan kann verða reiggjað *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM.

31 Og presturin skal brenna feittið uppiá altarinum: men bringan skal vera Aarons og sona hans.

32 Og høgra bógvin skulu tit geva prestinum *til* eitt hevjioffur av tykkara friðofraˇ-sláturofrum.

33 Hann, millum sona Aarons, sum ofrar blóðið av friðofrunum, og feittið, skal hava høgra bógvin til *sín* part.

34 Tí at reiggibringuna og hevjibógvin havi eg tikið av børnum Ísraels oman av sláturofrunum av teirra friðofrum, og havi givið tey at Aaroni presti og at hansara sonum viðˆ eini áseting um ævir Ísraels barna millum ífrá.

35 ¶ Hetta *er skamturin* av salvingini hjá Aaroni, og av salvingini hjá sonum hansara, burtur av ofrum HARRANS gjørdum viðˆ eldi, á tí degi *tá ið* hann framsetti teir at tæna at HARRANUM í prestsembætinum;

36 Hvønn HARRIN skipaði at verða givin teimum av børnum Ísraels, á tí degi sum hann salvaði teir, *viðˆ* eini áseting um ævir út gjøgnum ættir teirra.

37 Hetta *er* lógin um brenniofrið, um matofrið, og um syndofrið, og um misbrotsofrið, og um innvígingarnar, og um friðofraˇ-sláturofrið;

38 Hvørja HARRIN skipaði Mósesi á Sĭ´-naĭ fjalli, á tí degi sum hann ábjóðaði Ísraels børnum at ofra síni tilbiðjanar-offur at HARRANUM, í Sĭ´-naĭ-s oyðu.

KAPITUL 8

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,
2 Tak Aaron og hansara synir við honum, og klæðini, og salvingar-oljuna, og ein ungtarv til syndofrið, og tveir veðrar, og eina tægu av ósúrgaðum breyði;
3 Og savna tú alla samkomuna saman at dyrnum á samkomu-tabernaklinum.
4 Og Móses gjørdi sum HARRIN ábjóðaði honum; og savnaðurin varð savnaður saman at dyrnum á samkomu-tabernaklinum.
5 Og Móses segði við samkomuna, Hetta *er* tað tingið, sum HARRIN ábjóðaði at verða gjørt.
6 Og Móses førdi Aaron og synir hansara, og tvó teir við vatni.
7 Og hann koyrdi uppá hann kyrtilin, og gyrdi hann við gyrðlinum, og klæddi hann við skikkjuni, og koyrdi ê-phōd´-una uppá hann, og hann gyrdi hann við hinum kynstriliga gyrðli ê-phōd´-unnar, og bant *hana* at honum harvið.
8 Og hann koyrdi bróstskjøldurin uppá hann: hann eisini koyrdi í bróstskjøldurin Ū´-rĭm-in og Thûm´-mĭm-in.
9 Og hann setti vavhúgvuna uppá høvur hansara; eisini uppá vavhúgvuna, *enntá* uppá hennara framsíðu, setti hann hina gyltu plátu, hina heilagu krúnu; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
10 Og Móses tók salvingar-oljuna, og salvaði tabernaklið og alt sum harí *var,* og halgaði tey.
11 Og hann sletti harav uppá altarið sjey ferðir, og salvaði altarið og øll reiðir hans, bæði tváttarkerið og fót hans, til at halga tey.
12 Og hann helti av salvingar-oljuni uppá høvur Aarons, og salvaði hann, til at halga hann.
13 Og Móses kom við sonum Aarons, og koyrdi kyrtlar uppá teir, og gyrdi teir við gyrðlum, og setti høvuðbúnar uppá teir; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
14 Og hann kom við ungtarvinum til syndofrið: og Aaron og hansara synir løgdu sínar hendur uppá høvdið á ungtarvinum til syndofrið.
15 Og hann vó *hann;* og Móses tók blóðið, og koyrdi *tað* uppá hornini á altarinum runt umkring við fingri sínum, og reinsaði altarið, og helti blóðið við botnin á altarinum, og halgaði tað, til at gera endursóning uppá tað.
16 Og hann tók alt feittið sum *var* uppiá innvølunum, og hinnuna *uppivir* livrini, og tey tvey nýruni, og teirra feitt, og Móses brendi *tað* uppiá altarinum.
17 Men ungtarvin, og húð hansara, kjøt hansara, og skarn hansara, brendi hann við eldi uttanfyri leirin; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
18 ¶ Og hann kom við veðrinum til brenniofrið: og Aaron og hansara synir løgdu sínar hendur uppá høvdið á veðrinum.
19 Og hann drap *hann;* og Móses sletti blóðið uppá altarið runt umkring.
20 Og hann skar veðrin í stykkir; og Móses brendi høvdið, og stykkini, og feittið.
21 Og hann tvó innvølirnar og leggirnar í vatni; og Móses brendi allan veðrin uppiá altarinum: tað *var* eitt brenni-sláturoffur til ein søtan anga, *og* eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
22 ¶ Og hann kom við hînum veðrinum, innvígingar-veðrinum: og Aaron og hansara synir løgdu sínar hendur uppá høvdið á veðrinum.
23 Og hann vó *hann;* og Móses tók av blóðinum av honum, og koyrdi *tað* uppá tippin av høgra oyra Aarons, og uppá tummilin á

høgru hond hans, og uppá stórutánna á høgra fóti hans.
24 Og hann kom við sonum Aarons, og Móses koyrdi av blóðinum uppá tippin á teirra høgra oyra, og uppá tumlarnar á teirra høgru hondum, og uppá stórutærnar á teirra høgru fótum: og Móses sletti blóðið uppá altarið runt umkring.
25 Og hann tók feittið, og feithalan, og alt feittið sum *var* uppiá innvølunum, og hinnuna *uppiyvir* livrini, og tær tvær livrarnar, og teirra feitt, og høgra bógvin:
26 Og út úr tæguni við ósúrgaðum breyði, sum *var* frammi fyri HARRANUM, tók hann ēina ósúrgaða køku, og eina køku av oljaðum breyði, og ēina flatkøku, og koyrdi *tey* á feittið, og uppá høgra bógvin:
27 Og hann koyrdi alt uppá hendur Aarons, og uppá hendur sona hansara, og reiggjaði teimum *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM.
28 Og Móses tók tey oman av teirra hondum, og brendi *tey* á altarinum uppiá brenniofrinum: tey *vóru* innvígingar til ein søtan anga: tað *er* eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM.
29 Og Móses tók bringuna, og reiggjaði henni *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM: *tí* av innvígingar-veðrinum var tað Móse partur; eins og HARRIN skipaði Mósesi.
30 Og Móses tók av salvingar-oljuni, og av blóðinum sum *var* uppiá altarinum, og sletti *tað* uppá Aaron, *og* uppá klæðir hansara, og uppá synir hansara, og uppá klæðini hjá sonum hansara við honum; og halgaði Aaron, *og* klæðir hansara, og synir hansara, og klæðini hjá sonum hansara við honum.
31 ¶ Og Móses segði við Aaron og til sona hansara, Kókið kjøtið *við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum: og har etið tað við breyðinum sum *er* í innvígingar-tæguni, eins og eg ábeyð, sigandi, Aaron og hansara synir skulu eta tað.
32 Og tað, sum er eftir av kjøtinum og av breyðinum, skulu tit brenna við eldi.
33 Og tit skulu ikki fara út um dyrnar á samkomu-tabernaklinum *í* sjey dagar, inntil dagarnir av tykkara innvíging verði at enda: tí at sjey dagar skal hann innvíga tykkum.
34 Eins og hann hevur gjørt henda dag, *soleiðis* hevur HARRIN áboðið at gera, til at gera eina sáttargerð fyri tykkum.
35 Tí skulu tit verða *verandi við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum dag og nátt sjey dagar, og halda álegging HARRANS, at tit doyggi ikki: tí at soleiðis er áboðið mær.
36 So Aaron og hansara synir gjørdu øll ting sum HARRIN beyð við hendi Móse.

KAPITUL 9

OG tað hendi á tí áttanda deginum, *at* Móses kallaði Aaron og synir hansara, og hinar elstu av Ísrael;
2 Og hann segði við Aaron, Tak tær ein ungan kálv til eitt syndoffur, og ein veðr til eitt brennioffur, uttan lýti, og ofra *teir* frammi fyri HARRANUM.
3 Og við Ísraels børn skalt tú tala, sigandi, Takið tit eitt lamb av geitunum til eitt syndoffur; og ein kálv og eitt lamb, *bæði* hins fyrsta árs, uttan lýti, til eitt brennioffur;
4 Eisini ein ungtarv og ein veðr til friðoffur, til at sláturofra frammi fyri HARRANUM; og eitt matoffur blandað við olju: tí at í dag vil HARRIN birtast tykkum.
5 ¶ Og teir komu við *tí* sum Móses ábeyð framfyri samkomu-

tabernaklið: og øll samkoman dróg nær og stóð frammi fyri HARRANUM.

6 Og Móses segði, Hetta *er* tað tingið sum HARRIN ábjóðaði at tit skuldu gera: og HARRANS dýrd skal birtast tykkum.

7 Og Móses segði við Aaron, Far at altarinum, og ofra títt syndoffur, og títt brennioffur, og ger eina sáttargerð fyri teg sjálvan, og fyri fólkið: og ofra fólksins offur, og ger eina sáttargerð fyri teir; eins og HARRIN ábeyð.

8 ¶ Aaron tessvegna fór at altarinum, og vó syndoffurs-kálvin, sum *var* fyri sjálvan hann.

9 Og synirnir hjá Aaroni komu við blóðinum at honum: og hann dyppaði sín fingur í blóðið, og koyrdi *tað* uppá hornini á altarinum, og helti út blóðið við botnin av altarinum:

10 Men feittið, og nýruni, og hinnuna uppiyvir livrini hjá syndofrinum, brendi hann uppiá altarinum; eins og HARRIN skipaði Mósesi.

11 Og kjøtið og húðina brendi hann við eldi uttanfyri leirin.

12 Og hann vó brenniofrið; og synirnir hjá Aaroni framsettu honum blóðið, sum hann sletti runt umkring uppá altarið.

13 Og teir framsettu brenniofrið at honum, við stykkjunum harav, og høvdinum: og hann brendi *tey* uppiá altarinum.

14 Og hann tváaði innvølirnar og leggirnar, og brendi *tey* uppiá brenniofrinum á altarinum.

15 ¶ Og hann kom við ofri fólksins, og tók geitina, sum *var* syndofrið fyri fólkið, og vó hana, og ofraði hana fyri synd, eins og tað fyrsta.

16 Og hann kom við brenniofrinum, og ofraði tað samsvarandi við háttarlagið.

17 Og hann kom við matofrinum, og tók ein fullan lógva harav, og brendi *tað* uppiá altarinum, við síðuna av brenni-sláturofri morgunsins.

18 Hann vó eisini ungtarvin og veðrin *til* eitt friðofra˘-sláturoffur, sum *var* fyri fólkið: og synirnir hjá Aaroni framsettu at honum blóðið, sum hann sletti uppá altarið runt umkring,

19 Og feittið av ungtarvinum og av veðrinum, feithalan, og tað sum dekkar *innvølirnar,* og nýruni, og hinnuna *uppiyvir* livrini:

20 Og teir koyrdu feittið uppá bringurnar, og hann brendi feittið uppiá altarinum:

21 Og bringurnar og høgra bógvin reiggjaði Aaron *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM; eins og Móses ábeyð.

22 Og Aaron lyfti upp sína hond ímóti fólkinum, og vælsignaði tey, og kom niður frá ofring av syndofrinum, og brenniofrinum, og friðofrum.

23 Og Móses og Aaron fóru inn í samkomu-tabernaklið, og komu út, og vælsignaðu fólkið: og HARRANS dýrd birtist øllum fólkinum.

24 Og tað kom ein eldur út frammanfyri ífrá HARRANUM, og upptærdi uppiá altarinum brenniofrið og feittið: *hvørt,* tá ið alt fólkið sá, tey róptu, og fullu á andlit síni.

KAPITUL 10

OG Nádab og Ā´-bĭ-hû, synir Aarons, tóku hvør av teimum sína roykilsis-pannu, og koyrdu eld harí, og koyrdu roykilsi hará, og ofraðu fremmandan eld frammi fyri HARRANUM, sum hann bjóðaði teimum ikki.

2 Og tað fór út eldur frá HARRANUM, og upptærdi teir, og teir doyðu frammi fyri HARRANUM.

3 Tá segði Móses við Aaron, Hetta *er tað* sum HARRIN talaði, sigandi, Eg vil verða halgaður í

teimum sum koma nær mær, og frammi fyri øllum fólkinum vil eg verða dýrðmettur. Og Aaron helt friði sínum.

4 Og Móses kallaði Mí´-sjâ-ël og Ël´-zä-phân, synir Úz´-zï-ël-s, faðirbróður Aarons, og segði við teir, Komið nær, berið brøður tykkara frammanfyri ífrá halgidóminum út úr leirinum.

5 So teir fóru nær, og bóru teir í teirra kyrtlum út úr leirinum; eins og Móses hevði sagt.

6 Og Móses segði við Aaron, og við Ël-ë-ä´-zâr og við Ïth´-ä-mâr, hansara synir, Avdekkið ikki høvur˘ tykkara, eiheldur skræðið tykkara klæðir; at ikki tit doyggi, og at ikki vreiði komi uppá alt fólkið: men latið brøður tykkara, heila hús Ísraels, gráta um brenningina sum HARRIN hevur kynt.

7 Og tit skulu ikki fara út frá dyrnum á samkomu-tabernaklinum, at ikki tit doyggi: tí at salvingar-olja HARRANS *er* uppiá tykkum. Og teir gjørdu samsvarandi við orðið hjá Mósesi.

8 ¶ Og HARRIN talaði við Aaron, sigandi,

9 Drekk ikki vín ella sterkan drykk, tú, ella synir tínir hjá tær, tá ið tit fara inn í samkomu-tabernaklið, at ikki tit doyggi: *tað skal vera* ein áseting um ævir út gjøgnum ættir tykkara:

10 Og at tit mega seta mun ímillum heilagt og vanheilagt, og ímillum óreint og reint;

11 Og at tit mega læra Ísraels børn allar tær ásetingarnar sum HARRIN hevur talað við teir við^ hendi Mósesar.

12 ¶ Og Móses talaði við Aaron, og við Ël-ë-ä´-zâr og við Ïth´-ä-mâr, hansara synir sum vóru eftir, Takið matofrið sum er eftir av HARRANS ofrum gjørdum við^ eldi, og etið tað uttan súrdeiggj við síðuna av altarinum: tí at tað *er* mest heilagt:

13 Og tit skulu eta tað í tí heilaga plássinum, av tí at tað *er* tilskilan tín, og tilskilan sona tína, av HARRANS sláturofrum gjørdum við^ eldi: tí at soleiðis er mær boðið.

14 Og reiggibringuna og hevjibógvin skulu tit eta í einum reinum plássi; tú, og synir tínir, og døtur tínar við tær: tí at *tey veri* tilskilan tín, og tilskilan sona tína, *sum* eru givin burturav friðofra˘-sláturofrum Ísraels barna.

15 Hevjibógvin og reiggibringuna skulu teir bera við ofrunum gjørdum við^ eldi av feittinum, til at reiggja *tí til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM; og tað skal vera títt, og sona tína við tær, við^ eini áseting um ævir; eins og HARRIN hevur áboðið.

16 ¶ Og Móses dúgligani søkti syndoffurs-geitina, og sí, hon var brend: og hann varð firtin við Ël-ë-ä´-zâr og Ïth´-ä-mâr, synir Aarons *sum vóru* eftir *livandi,* sigandi,

17 Hvørsvegna hava tit ikki etið syndofrið í tí heilaga plássinum, við tað at tað *er* mest heilagt, og *Guð* hevur givið tað tykkum til at bera misgerðina hjá samkomuni, til at gera sáttargerð fyri teir frammi fyri HARRANUM?

18 Sí, blóðið av tí varð ikki ført inn innum tað heilaga *plássið:* tit skuldu víst havt etið tað í tí heilaga *plássinum,* eins og eg bjóðaði.

19 Og Aaron segði við Móses, Sí, henda dag hava teir ofrað syndoffur sítt og brennioffur sítt frammi fyri HARRANUM; og slík ting hava viðfarist mær: og *um* eg hevði etið syndofrið í dag, skuldi tað havt verðið góðkent í eygsjón HARRANS?

20 Og tá ið Móses hoyrdi *tað,* varð hann nøgdur.

KAPITUL 11

OG HARRIN talaði við Móses og til Aarons, sigandi við teir,

2 Talið við børn Ísraels, sigandi, Hesi *eru* djórini sum tit skulu eta millum alra djóranna sum *eru* á jørðini.

3 Hvatsumhelst *ið* deilir hógvina, og er kloyvufótað, *og* tyggir jótrið, djóranna millum, tað skulu tit eta.

4 Hóast hetta, hesi skulu tit ikki eta av teimum sum tyggja jótrið, ella av teimum sum deila hógvina: *eins og* kamelin, av tí at hann tyggir jótrið, men deilir ikki hógvina; hann *er* óreinur at tykkum.

5 Og kaninina, av tí at hon tyggir jótrið, men deilir ikki hógvina; hon *er* órein at tykkum.

6 Og haruna, av tí at hon tyggir jótrið, men deilir ikki hógvina; hon *er* órein at tykkum.

7 Og svínið, hóast tað deili hógvina, og veri *seg* kloyvufótað, tó tyggir tað ikki jótrið; tað *er* óreint fyri tykkum.

8 Av teirra kjøti skulu tit ikki eta, og teirra ræ skulu tit ikki nerta; tey *eru* órein fyri tykkum.

9 ¶ Hesi skulu tit eta av øllum sum *eru* í vøtnunum: hvatsumhelst *ið* hevur fjaðrar og roðslu í vøtnunum, í sjógvunum, og í áunum, tey skulu tit eta.

10 Og øll sum hava ikki fjaðrar og roðslu í sjógvunum, og í áunum, av øllum sum rørast í vøtnunum, og av nøkrum livandi tingi sum *er* í vøtnunum, tey *skulu vera* ein andstygd at tykkum:

11 Tey skulu vera enntá ein andstygd at tykkum; tit skulu ikki eta av teirra kjøti, men tit skulu hava ræini hjá teimum í andstygni.

12 Hvatsumhelst *ið* hevur ongar fjaðrar ella roðslu í vøtnunum, tað *skal vera* ein andstygd at tykkum.

13 ¶ Og hesir *eru teir sum* tit skulu hava í andstygni fuglanna millum; teir skulu ei verða etnir, teir *eru* ein andstygd: ørnin, og glentan, og havørnin,

14 Og gammurin, og skaðafalkurin eftir slagi sínum;

15 Hvør ravnur eftir slagi sínum;

16 Og uglan, og náttheykurin, og geykurin, og heykurin eftir slagi sínum,

17 Og smáuglan, og hiplingurin, og stóruglan,

18 Og svanurin, og pelikanurin, og rægammurin,

19 Og storkurin, hegran eftir slagi sínum, herfuglurin, og flogmúsin.

20 Allir fuglar sum skríða, farandi uppiá *øllum* fýra, *skulu vera* ein andstygd at tykkum.

21 Tó, hesar mega tit eta av hvørjum flúgvandi skriðkykti sum fer uppiá *øllum* fýra, sum hava leggir omanfyri føtur sínar, til at leypa við uppiá jørðini;

22 *Enntá* hesar av teimum mega tit eta; flyti-grashoppuna eftir slagi sínum, og ta skallutu grashoppuna eftir slagi sínum, og kakkulakkin eftir slagi sínum, og grashoppuna eftir slagi sínum.

23 Men øll *onnur* flúgvandi skriðkykt, sum hava fýra bein, *skulu vera* ein andstygd at tykkum.

24 Og fyri hesi skulu tit vera óreinir: hvørsumhelst *ið* nertur við ræið av teimum, skal vera óreinur inntil kvøldið.

25 Og hvørsumhelst *ið* ber *nakað* av ræinum av teimum, skal tváa klæðir síni, og vera óreinur inntil kvøldið.

26 *Ræini* av hvørjum djóri sum deilir hógvina, og *er* ikki kloyvufótað, ella tyggir jótrið, *eru* órein at tykkum: hvør tann sum nertur við tey, skal vera óreinur.

27 Og hvatsumhelst *ið* gongur uppiá labbum sínum, millum alt háttarlag av djórum sum ganga á *øllum* fýra, tey *eru* órein at tykkum: hvør*iðenn* nertur við ræ teirra, skal vera óreinur inntil kvøldið.

28 Og hann, sum ber ræið av

teimum, skal tváa klæðir síni, og vera óreinur inntil kvøldið: tey *eru* órein at tykkum.

29 ¶ Hesi eisini *skulu vera* órein at tykkum millum skriðkyktini sum skríða uppiá jørðini; veslan, og músin, og skjaldbøkan eftir slagi sínum,

30 Og eltiveslan, og kamelónin, og ferføtlan, og snigilin, og moldvørpan.

31 Hesi *eru* órein fyri tykkum millum øll sum skríða: hvørsumhelst *ið* nertur við tey, tá ið tey veri deyð, skal vera óreinur inntil kvøldið.

32 Og uppá hvatsumhelst *ið nakað* av teimum, tá ið tey eru deyð, fellur, tað skal vera óreint; hvørt *tað veri seg* nakað ílat av træi, ella klæði, ella skinni, ella sekki, hvatsumhelst ílat *tað veri seg,* hvarí *nakað* arbeiði verður gjørt, tað má verða koyrt í vatn, og tað skal vera óreint inntil kvøldið; so skal tað vera reinsað.

33 Og hvørt jarðílat, hvarinní *nakað* av teimum fellur, hvatsumhelst *ið er* í tí, skal vera óreint; og tit skulu bróta tað.

34 Av øllum mati sum má verða etin, *tað,* á hvørt *slíkt* vatn kemur, skal vera óreint: og allur drykkur, sum má verða drukkin í hvørjum *slíkum* ílati, skal vera óreinur.

35 Og hvørt *ting,* hvaruppá *nakar partur* av teirra ræum fellur, skal vera óreint; *hvørt tað veri seg* ovnur, ella uppstillingar til pottar, tey skulu verða brotin niður: *tí at* tey *eru* órein, og skulu vera órein at tykkum.

36 Hóast hetta, ein kelda ella ein hola, *í hvørjum tað er* ríviligt av vatni, skal vera rein: men tað, sum nertur við ræið hjá teimum, skal vera óreint.

37 Og um *nakar partur* av teirra ræi falli uppá nakað sáðikorn, sum eigur at verða sáað, tað *skal vera* reint.

38 Men um *nakað* vatn verði koyrt uppá sáðkornið, og *nakar partur* av teirra ræi falli hará, tað *skal vera* óreint at tykkum.

39 Og um nakað djór, av hvørjum tit mega eta, doyggi; hann ið nertur við ræið av tí, skal vera óreinur inntil kvøldið.

40 Og hann ið etur av ræinum av tí, skal tváa klæðir síni, og vera óreinur inntil kvøldið: hann eisini sum ber ræið av tí, skal tváa klæðir síni, og vera óreinur inntil kvøldið.

41 Og hvørt skriðkykt, sum skríður uppiá jørðini, *skal vera* ein andstygd; tað skal ei verða etið.

42 Hvatsumhelst *ið* fer uppiá búkinum, og hvatsumhelst *ið* fer uppiá *øllum* fýra, ella hvatsumhelst *ið* hevur fleiri føtur millum øll skriðkykt sum skríða uppiá jørðini, tey skulu tit ikki eta; tí at tey *eru* ein andstygd.

43 Tit skulu ikki gera tykkum sjálvar andstyggiligar við nøkrum skriðkykti sum skríður, eiheldur skulu tit gera tykkum sjálvar óreinar við teimum, at tit skuldu verðið dálkaðir harvið̂.

44 Tí at eg *eri* HARRIN Guð tykkara: tit skulu tí halga tykkum sjálvar, og tit skulu vera heilagir; tí at eg *eri* heilagur: eiheldur skulu tit dálka tykkum sjálvar við nøkrum háttarlagi av skriðkykti sum skríður uppiá jørðini.

45 Tí at eg *eri* HARRIN, sum førir tykkum upp úr Egyptalandi, at vera Guð tykkara: tit skulu tí vera heilagir, tí at eg *eri* heilagur.

46 Hetta *er* lógin um djórini, og um fuglarnar, og um hvønn livandi skapning sum rørist í vøtnunum, og um hvønn skapning sum skríður uppiá jørðini:

47 Til at gera ein mun ímillum hitt óreina og tað reina, og ímillum djórið sum má verða etið, og djórið sum má ei verða etið.

KAPITUL 12

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,
2 Tala við børn Ísraels, sigandi, Um ein kvinna havi alið fram sáð, og føtt eitt sveinsbarn: tá skal hon vera órein sjey dagar; samsvarandi við dagarnar av sínum atskilnaði fyri sín veikleika skal hon vera órein.
3 Og í tí áttanda deginum skal kjøtið av hansara forhúð verða umskorið.
4 Og hon skal tá halda áfram í blóðinum av síni skírgan tríggjar og tríati dagar; hon skal nerta við einkið halgað ting, ella koma inn í halgidómin, inntil dagarnir av hennara skírgan verði uppfyltir.
5 Men um hon føði eitt gentubarn, so skal hon vera órein tvær vikur, eins og í sínum atskilnaði: og hon skal halda áfram í blóðinum av síni skírgan trísinstjúgu og seks dagar.
6 Og tá ið dagarnir av hennara skírgan eru uppfyltir, fyri ein son, ella fyri eina dóttur, skal hon koma við einum fyrsta árs lambi til eitt brennioffur, og eini ungari dúgvu, ella eini turtildúgvu, til eitt syndoffur, at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, at prestinum:
7 Sum skal ofra tað frammi fyri HARRANUM, og gera eina sáttargerð fyri hana; og hon skal verða reinsað frá útganginum av sínum blóði. Hetta *er* lógin fyri hana sum hevur føtt eitt kallkyns ella eitt kvennkyns.
8 Og um hon veri ikki før fyri at koma við einum lambi, so skal hon koma við tveimum turtil*dúgvum*, ella tveimum ungum dúgvum; tí ēinu til brenniofrið, og hīnari til eitt syndoffur: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hana, og hon skal vera rein.

KAPITUL 13

OG HARRIN talaði við Móses og Aaron, sigandi,
2 Tá ið ein maður skal hava í húðini av sínum kjøti eina reising, eina skruvu, ella bjartan blett, og tað veri í húðini av hansara kjøti *líkasum* plágan av spitalskni, tá skal hann verða førdur at Aaroni presti, ella at ēinum av hansara sonum, prestunum:
3 Og presturin skal hyggja á pláguna í húðini av hansara kjøti: og *tá ið* hárið í pláguni er skift *til* hvítt, og plágan í útsjónd *veri seg* djypri enn húðin av hansara kjøti, *tá er* tað ein plága av spitalskni: og presturin skal hyggja á hann, og lýsa hann óreinan.
4 Um tann bjarti bletturin *veri seg* hvítur í húðini av hansara kjøti, og í útsjónd *veri seg* ikki djypri enn húðin, og hárið harav veri *seg* ikki skift *til* hvítt; tá skal presturin loka inni *hann, sum hevur* pláguna, sjey dagar:
5 Og presturin skal hyggja á hann tann sjeynda dagin: og sí, *um* plágan í hans eygsjón veri *seg* við eina *still*støðu, *og* plágan spreiði *seg* ikki í húðini; tá skal presturin loka hann inni sjey dagar afturat:
6 Og presturin skal hyggja á hann aftur hin sjeynda dagin: og sí, *um* plágan *veri seg* eitthvørt myrk, *og* plágan spreiði *seg* ikki í húðini, skal presturin lýsa hann reinan: tað *er bert* ein skruva: og hann skal tváa klæðir síni, og vera reinur.
7 Men um skruvan spreiði *seg* nógv útum í húðini, eftir at hann hevur verðið sæddur av prestinum til reinsan sína, skal hann verða sæddur av prestinum aftur:
8 Og *um* presturin síggi, at sí, skruvan spreiðir *seg* í húðini, so skal presturin lýsa hann óreinan: tað *er* ein spitalskni.

9 ¶ Tá ið plágan av spitalskni er í einum manni, tá skal hann verða førdur at prestinum;
10 Og presturin skal skoða *hann:* og sí, *um* reisingin *veri seg* hvít í húðini, og hon havi skift hárið *til* hvítt, og *tað veri seg* kykt rátt kjøt í reisingini;
11 *Tá er* tað ein gomul spitalskni í húðini av hansara kjøti, og presturin skal lýsa hann óreinan, og skal ikki loka hann inni: tí at hann *er* óreinur.
12 Og um ein spitalskni bróti út útumkring í húðini, og spitalsknin dekki alla húðina á *honum sum hevur* pláguna, frá hansara høvdi enntá til hansara fót, hvarsumhelst *ið* presturin hyggur;
13 Tá skal presturin umhugsa: og sí, *um* spitalsknin havi dekkað alt hansara kjøt, *tá* skal hann lýsa *hann* reinan *sum hevur* pláguna: tað er alt skift *til* hvítt: hann *er* reinur.
14 Men tá ið rátt kjøt birtist í honum, skal hann vera óreinur.
15 Og presturin skal skoða tað ráa kjøtið, og lýsa hann at vera óreinan: *tí at* tað ráa kjøtið *er* óreint: tað *er* ein spitalskni.
16 Ella um hitt ráa kjøtið vendi aftur, og verði broytt at hvítum, skal hann koma at prestinum;
17 Og presturin skal skoða hann: og sí, *um* plágan veri skift til hvítt; tá skal presturin lýsa *hann* reinan *sum hevur* pláguna: hann *er* reinur.
18 ¶ Kjøtið eisini, í hvørjum, *enntá* í húð tess, var ein búldur, og er grøtt,
19 Og í plássinum av búldinum tað veri ein hvít reising, ella ein bjartur blettur, hvítur, og eitthvørt reydligur, og tað verði sýnt fyri prestinum;
20 Og um, tá ið presturin sær tað, sí, tað *veri* í útsjónd lægri enn húðin, og tess hár veri skift *til* hvítt; *tá* skal presturin lýsa hann óreinan: tað *er* ein plága av spitalskni brotin út úr búldinum.
21 Men um presturin hyggi á tað, og sí, *tað veri* eingi hvít hár harí, og *um* tað *veri* ikki lægri enn húðin, men *veri seg* nakað myrkt; tá skal presturin loka hann inni sjey dagar:
22 Og um tað spreiði *seg* mikið útum í húðini, tá skal presturin lýsa hann óreinan: tað *er* ein plága.
23 Men um tann bjarti bletturin standi í staði sínum, *og* spreiði *seg* ikki, *er* tað ein brunandi búldur; og presturin skal lýsa hann reinan.
24 ¶ Ella um tað veri *nakað* kjøt, í húðini av hvørjum *tað er* ein heitur bruni, og hitt kyka *kjøtið,* sum brunar, havi ein hvítan, bjartan blett, eitthvørt reydligur, ella hvítur;
25 Tá skal presturin hyggja uppá tað: og sí, *um* hárið í tí bjarta blettinum veri skift *til* hvítt, og tað *veri í* útsjónd djypri enn húðin; tað *er* ein spitalskni brotin út úr brunanum: hvørsvegna presturin skal lýsa hann óreinan: tað *er* plágan av spitalskni.
26 Men um presturin hyggi á tað, og sí, *tað veri* einkið hvítt hár í tí bjarta blettinum, og tað *veri* einkið lægri enn *hīn* húðin, men *veri seg* nakað myrkt; tá skal presturin loka hann inni sjey dagar:
27 Og presturin skal hyggja uppá hann tann sjeynda dagin: *og* um tað veri *seg* spreitt mikið útum í húðini, tá skal presturin lýsa hann óreinan: tað *er* plágan av spitalskni.
28 Og um tann bjarti bletturin standi í staði sínum, *og* spreiði *seg* ikki í húðini, men hann *veri seg* nakað myrkur; tað *er* ein reising av brunanum, og presturin skal lýsa hann reinan: tí at tað *er* ein uppflamman av brunanum.

29 ¶ Um ein maður ella kvinna havi eina plágu uppiá høvdinum ella skegginum;
30 Tá skal presturin skoða pláguna: og sí, um hon *veri* í útsjónd djypri enn húðin; *og tað veri* í henni eitt gult, tunt hár; tá skal presturin lýsa hann óreinan: tað *er* ein turr skurva, *enntá* ein spitalskni uppiá høvdinum ella skegginum.
31 Og um presturin hyggi á pláguna av skurvuni, og sí, tað *veri seg* ikki í útsjónd djypri enn húðin, og *at tað er* einkið svart hár í henni; tá skal presturin loka inni *hann, sum hevur* pláguna av skurvuni, sjey dagar:
32 Og í hinum sjeynda degi skal presturin hyggja á pláguna: og sí, *um* skurvan spreiði *seg* ikki, og tað veri í henni einkið gult hár, og skurvan *veri* ikki í útsjónd djypri enn húðin;
33 *So* skal hann verða rakaður, men skurvuna skal hann ikki raka; og presturin skal loka inni *hann, sum hevur* skurvuna, sjey dagar afturat:
34 Og í hinum sjeynda degi skal presturin hyggja á skurvuna: og sí, *um* skurvan veri ikki spreidd í húðini, ella *veri* í útsjónd djypri enn húðin; tá skal presturin lýsa hann reinan: og hann skal tváa klæðir síni, og vera reinur.
35 Men um skurvan spreiði *seg* nógv í húðini eftir reinsan hansara;
36 Tá skal presturin hyggja á hann: og sí, um skurvan veri *seg* spreidd í húðini, *so* skal presturin ikki søkja eftir gulum hári; hann *er* óreinur.
37 Men um skurvan veri í eygsjón hansara við eina *still*støðu, og *at* tað er svart hár vaksið upp hará; *tá* er skurvan grødd, hann *er* reinur: og presturin skal lýsa hann reinan.
38 ¶ Um ein maður eisini ella ein kvinna havi í húðini av teirra kjøti bjartar blettir, *enntá* hvítar bjartar blettir;
39 So skal presturin hyggja: og sí, *um* teir bjørtu blettirnir í húðini av teirra kjøti *veri seg* myrkleitt hvítir; *tá er* tað ein frøknutur blettur *sum* veksur í húðini; hann *er* reinur.
40 Og maðurin, hvørs hár er fallið av hansara høvdi, hann *er* skallutur; *tó er* hann reinur.
41 Og hann ið hevur hár sítt fallið av frá partinum av sínum høvdi ímóti andliti sínum, hann *er* enni-skallutur: *tó er* hann reinur.
42 Og um tað veri í tí skalluta høvdinum, ella tí skalluta enninum, eitt hvítt, reydligt sár; tað *er* ein spitalskni brotin út á hansara skalluta høvdi, ella hansara skalluta enni.
43 Tá skal presturin hyggja uppá tað: og sí, *um* reisingin av sárinum *veri seg* hvít reydlig í hansara skalluta høvdi, ella í hansara skalluta enni, sum spitalsknin birtist í húðini av hansara kjøti;
44 Hann er ein spitalskur maður, hann *er* óreinur: presturin skal lýsa hann aldeilis óreinan; hansara plága *er* í høvdi hansara.
45 Og tann spitalski, í hvørjum plágan *er,* hansara klæðir skulu verða skrødd, og høvd hansara bert, og hann skal koyra eina dekking uppá sína ovaru vørr, og skal rópa, Óreinur, óreinur.
46 Allar dagarnar, hvarí plágan *skal vera* í honum, skal hann vera dálkaður; hann *er* óreinur: hann skal búgva einsamallur; uttanfyri leirin *skal* hansara bústaður *vera*.
47 ¶ Klæðið eisini, sum plágan av spitalskni er í, *hvørt tað veri* eitt ullint klæði, ella eitt línklæði;
48 Hvørt *tað veri* í rennigarninum, ella veftrinum; av líni, ella av ullintum; hvørt í einum skinni, ella í nøkrum tingi gjørdum av skinni;

49 Og um plágan veri *seg* grønlig ella reydlig í klæðinum, ella í skinninum, annaðhvørt í rennigarninum, ella í veftrinum, ella í nøkrum tingi av skinni; tað *er* ein plága av spitalskni, og skal verða sýnt prestinum:

50 Og presturin skal hyggja uppá pláguna, og loka inni *tað, sum hevur* pláguna, sjey dagar:

51 Og hann skal hyggja á pláguna á hinum sjeynda deginum: um plágan veri *seg* spreidd í klæðinum, annaðhvørt í rennigarninum, ella í veftrinum, ella í einum skinni, *ella* í nøkrum verki sum er gjørt av skinni; *tá er* plágan ein etandi spitalskni; tað *er* óreint.

52 Hann skal tí brenna tað klæðið, hvørt *tað veri seg* rennigarn ella veftur, í ullintum ella í líni, ella nakað ting av skinni, í hvørjum plágan er: tí at tað *er* ein etandi spitalskni; tað skal verða brent í eldinum.

53 Og um presturin skal skoða, og sí, plágan veri *seg* ikki spreidd í klæðinum, hvørki í rennigarninum, ella í veftrinum, ella í nøkrum tingi av skinni;

54 Tá skal presturin ábjóða at teir tvái tað *tingið,* í hvørjum plágan *er,* og hann skal loka tað inni sjey dagar afturat:

55 Og presturin skal hyggja á pláguna, eftir at tað er tváað: og sí, *um* plágan havi ikki broytt sín lit, og plágan veri ikki spreidd; tað *er* óreint; tú skalt brenna tað í eldinum; tað *er* etið inneftir; *hvørt* tað *veri seg* nakið innan ella uttan.

56 Og um presturin hyggi, og sí, plágan *veri seg* nakað myrk eftir tváingina av tí; tá skal hann skræða hana úr klæðinum, ella úr skinninum, ella úr rennigarninum, ella úr veftrinum:

57 Og um tað sýni *seg* enn í klæðinum, annaðhvørt í rennigarninum, ella í veftrinum, ella í nøkrum tingi av skinni; *tá er* tað ein spreiðandi *plága:* tú skalt brenna tað, í hvørjum plágan *er,* við eldi.

58 Og klæðið, annaðhvørt rennigarn, ella veftur, ella hvatsumhelst ting av skinni *tað veri seg,* sum tú skalt tváa, um plágan veri *seg* farin burtur frá teimum, tá skal tað verða tvigið *fyri* aðru ferð, og skal vera reint.

59 Hetta *er* lógin um pláguna av spitalskni í einum klæði av ullintum ella líni, annaðhvørt í rennigarninum, ella veftrinum, ella nøkrum tingi av skinnum, til at lýsa tað reint, ella til at lýsa tað óreint.

KAPITUL 14

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Hetta skal vera lógin um hin spitalska í deginum av hansara reinsan: Hann skal verða førdur at prestinum:

3 Og presturin skal fara fram út úr leirinum; og presturin skal hyggja, og sí, *um* plágan av spitalskni veri *seg* grødd í tí spitalska;

4 Tá skal presturin bjóða at taka fyri hann, sum eigur at verða reinsaður, tveir fuglar livandi *og* reinar, og sedrisvið, og skarlak, og ýsop:

5 Og presturin skal skipa, at ēin av fuglunum verði dripin í einum jarðílati yvir rennandi vatni:

6 Hvat tí livandi fuglinum viðvíkur, hann skal taka hann, og sedrisviðin, og skarlakið, og ýsopin, og skal dyppa tey og tann livandi fuglin í blóðið av fuglinum *sum varð* dripin yvir tí rennandi vatninum:

7 Og hann skal sletta uppá hann, sum eigur at verða reinsaður frá spitalsknini, sjey ferðir, og skal lýsa hann reinan, og skal lata tann livandi fuglin leysan inn í hin opna akurin.

8 Og hann, sum eigur at verða reinsaður, skal tváa klæðir síni, og raka av alt hár sítt, og tváa sær í vatni, at hann má vera reinur: og eftir tað skal hann koma inn í leirin, og skal dvølja útium uttanfyri tjald sítt sjey dagar.

9 Men tað skal verða á hinum sjeynda deginum, at hann skal raka alt sítt hár av sínum høvdi og skegg sítt og eygnabrýr sínar, enntá alt sítt hár skal hann raka av: og hann skal tváa klæðir síni, hann eisini skal tváa kjøt sítt í vatni, og hann skal vera reinur.

10 Og á hinum áttanda degi skal hann taka tvey veðurlomb uttan lýti, og ēitt gimburlamb hins fyrsta árs uttan lýti, og tríggjar tíggjunddeilir av fínum mjøli *til* eitt matoffur, blandað við olju, og ēina log av olju.

11 Og presturin, sum ger *hann* reinan, skal framseta mannin sum eigur at verða gjørdur reinur, og tey tingini, framfyri HARRAN, *við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum:

12 Og presturin skal taka ēitt veðurlamb, og ofra hann til eitt misbrotsoffur, og logina av olju, og reiggja teimum *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM:

13 Og hann skal vega lambið í tí plássinum har hann skal drepa syndofrið og brenniofrið, í hinum heilaga plássi: tí at eins og syndofrið *er* prestsins, *soleiðis er* misbrotsofrið: tað *er* mest heilagt:

14 Og presturin skal taka *nakað* av blóðinum av misbrotsofrinum, og presturin skal koyra *tað* uppá spískin á høgra oyranum á honum sum eigur at verða reinsaður, og uppá tummilin á høgru hond hansara, og uppá stórutánna á høgra fóti hansara:

15 Og presturin skal taka *nakað* av logini av olju, og hella *tað* inn í lógvan á síni egnu vinstru hond:

16 Og presturin skal dyppa sín høgra fingur í oljuna, sum *er* í vinstru hond hansara, og skal sletta av oljuni við sínum fingri sjey ferðir framfyri HARRAN:

17 Og av restini av oljuni, sum *er* í hond hansara, skal presturin koyra uppá spískin á høgra oyranum á honum sum eigur at verða reinsaður, og uppá tummilin á høgru hond hansara, og uppá stórutánna á hansara høgra fóti, uppá blóðið av misbrotsofrinum:

18 Og leivdina av oljuni, sum *er* í prestsins hond, skal hann hella uppá høvdið á honum sum eigur at verða reinsaður: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann frammi fyri HARRANUM.

19 Og presturin skal ofra syndofrið, og gera eina sáttargerð fyri hann sum eigur at verða reinsaður frá síni óreinsku; og síðan skal hann drepa brenniofrið:

20 Og presturin skal ofra brenniofrið og matofrið uppiá altarinum: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann, og hann skal vera reinur.

21 Og um hann *veri seg* fátækur, og kann ikki fáa so nógv; so skal hann taka ēitt lamb *til* eitt misbrotsoffur til at verða reiggjað, til at gera eina sáttargerð fyri hann, og ēin tíggjunddeil av fínum mjøli blandað við olju til eitt matoffur, og eina log av olju;

22 Og tvær turtildúgvur, ella tvær ungar dúgvur, slíkar sum hann er førur fyri at fáa; og tann ēina skal vera eitt syndoffur, og hīn eitt brennioffur.

23 Og hann skal koma við teimum á hinum áttanda degi fyri sína reinsan at prestinum, at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, framfyri HARRAN.

24 Og presturin skal taka misbrotsoffurs-lambið, og logina av olju, og presturin skal reiggja teimum *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM:

25 Og hann skal drepa misbrotsoffurs-lambið, og presturin skal taka *nakað* av blóðinum av misbrotsofrinum, og koyra *tað* uppá spískin á høgra oyranum á honum sum eigur at verða reinsaður, og uppá tummilin á høgru hond hansara, og uppá stórutánna á høgra fóti hansara:
26 Og presturin skal hella av oljuni inn í lógvan á síni egnu vinstru hond:
27 Og presturin skal sletta við sínum høgra fingri *nakað* av oljuni, sum *er* í vinstru hond hansara, sjey ferðir framfyri HARRAN:
28 Og presturin skal koyra av oljuni, sum *er* í hond hansara, uppá spískin á høgra oyranum á honum sum eigur at verða reinsaður, og uppá tummilin á høgru hond hansara, og uppá stórutánna á høgra fóti hansara, uppá staðið av blóðinum av misgerðarofrinum:
29 Og restina av oljuni, sum *er* í prestsins hond, skal hann koyra uppá høvdið á honum sum eigur at verða reinsaður, til at gera eina sáttargerð fyri hann frammi fyri HARRANUM.
30 Og hann skal ofra ta ēinu av turtildúgvunum, ella av teimum ungu dúgvunum, slíkar sum hann kann skaffa;
31 *Enntá* slíkar sum hann er førur fyri at fáa, ta ēinu *til* eitt syndoffur, og hīna *til* eitt brennioffur, við matofrinum: og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann, sum eigur at verða reinsaður, frammi fyri HARRANUM.
32 Hetta *er* lógin *um hann,* í hvørjum *er* plágan av spitalskni, hvørs hond er ikki før fyri at fáa *tað sum hoyrir* til reinsan hansara.
33 ¶ Og HARRIN talaði við Móses og við Aaron, sigandi,
34 Tá ið tit verði komnir inn í land Cānaans, sum eg gevi til tykkara til eina ogn, og eg leggi pláguna av spitalskni í eitt hús av landi ognar tykkara;
35 Og hann, sum eigur húsið, skal koma og siga prestinum, sigandi, Tað tykist fyri mær, *at tað er* sum var tað ein plága í húsinum:
36 Tá skal presturin bjóða, at teir tømi húsið, áðrenn presturin fari *inn í tað* at skoða pláguna, at alt, sum *er* í húsinum, verði ei gjørt óreint: og síðani skal presturin fara inn at skoða húsið:
37 Og hann skal hyggja á pláguna, og sí, *um* plágan *veri seg* í veggunum av húsinum við innanopnum strikum, grønligum ella reydligum, sum í ásýnd *eru* lægri enn veggurin;
38 Tá skal presturin fara út úr húsinum til dyrnar á húsinum, og loka fyri húsið sjey dagar:
39 Og presturin skal koma aftur hin sjeynda dagin, og skal hyggja: og sí, *um* plágan veri *seg* spreidd í veggunum av húsinum;
40 Tá skal presturin bjóða at teir taki burtur steinarnar, í hvørjum plágan *er,* og teir skulu kasta teir inn í eitt óreint pláss uttanfyri staðin:
41 Og hann skal elva húsinum at verða skavaðum innan runt umkring, og teir skulu hella út dustið, sum teir skava av, uttanfyri staðin inn í eitt óreint pláss:
42 Og teir skulu taka aðrar steinar, og koyra *teir* í plássini hjá teimum steinunum; og hann skal taka annan mørtil, og skal sparsla húsið.
43 Og um plágan komi aftur, og bróti út í húsinum, eftir at hann hevur tikið burtur steinarnar, og eftir *at* hann hevur skavað húsið, og eftir *at* tað er sparslað;
44 So skal presturin koma og hyggja, og sí, *um* plágan veri *seg* spreidd í húsinum, tað *er* ein etandi spitalskni í húsinum: tað *er* óreint.
45 Og hann skal bróta niður hús-

ið, og steinarnar av tí, og timbur tess, og allan mørtil hússins; og hann skal bera *tey* fram út úr staðinum inn í eitt óreint pláss.

46 Haraftrat skal hann, sum fer inn í húsið alla ta tíðina sum tað er lokað fyri, vera óreinur inntil kvøldið.

47 Og hann, sum liggur í húsinum, skal tváa klæðir síni; og hann, sum etur í húsinum, skal tváa klæðir síni.

48 Og um presturin skal koma inn, og hyggja *uppá tað,* og sí, plágan hevur ikki spreitt *seg* í húsinum, eftir *at* húsið varð sparslað: tá skal presturin lýsa húsið reint, av tí at plágan er grødd.

49 Og hann skal taka til at reinsa húsið tveir fuglar, og sedrisvið, og skarlak, og ýsop:

50 Og hann skal drepa tann ēina av fuglunum í einum jarðílati yvir rennandi vatni:

51 Og hann skal taka sedrisviðin, og ýsopin, og skarlakið, og tann livandi fuglin, og dyppa tey í blóðið av tí vigna fuglinum, og í tað rennandi vatnið, og ásletta húsið sjey ferðir:

52 Og hann skal reinsa húsið við blóðinum av fuglinum, og við tí rennandi vatninum, og við tí livandi fuglinum, og við sedrisviðinum, og við ýsopinum, og við skarlakinum:

53 Men hann skal lata fara hin livandi fuglin út úr staðinum inn í teir opnu akrarnar, og gera eina sáttargerð fyri húsið: og tað skal vera reint.

54 Hetta *er* lógin fyri alskyns plágu av spitalskni, og skurvu,

55 Og fyri spitalsknina av einum klæði, og av einum húsi,

56 Og fyri eina reising, og fyri eina skruvu, og fyri ein bjartan blett:

57 Til at frálæra nær *tað er* óreint, og nær *tað er* reint: hetta *er* lógin um spitalskni.

KAPITUL 15

OG HARRIN talaði við Móses og til Aarons, sigandi,

2 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Tá ið nakar maður hevur eitt rennandi útflot út úr kjøti sínum, *uppá grund av* sínum útfloti *er* hann óreinur.

3 Og hetta skal vera óreinska hans í útfloti hans: hvørt kjøt hans renni við útfloti hans, ella hansara kjøt veri *seg* tipt frá útfloti hans, tað *er* óreinska hans.

4 Hvør song, hvará hann liggur sum hevur útflotið, er órein: og hvørt ting, hvará hann situr, skal vera óreint.

5 Og hvørsumhelst *ið* nemur við song hansara, skal tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.

6 Og hann sum situr á *nøkrum* tingi, hvará hann sat sum hevur útflotið, skal tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.

7 Og hann, sum nertur við kjøtið á honum sum hevur útflotið, skal tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.

8 Og um hann, sum hevur útflotið, spýti uppá hann sum er reinur; tá skal hann tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.

9 Og hvør saðil sumhelst, *sum* hann ríður uppiá sum hevur útflotið, skal vera óreinur.

10 Og hvørsumhelst *ið* nemur við nakað ting sum var undir honum, skal vera óreinur inntil kvøldið: og hann, sum ber *nakað av* hasum tingunum, skal tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.

11 Og hvønnsumhelst *ið* hann nemur við, sum hevur útflotið, og hevur ikki reinsað hendur sínar í vatni, hann skal tváa klæðir

síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.
12 Og jarðílatið, sum hann nemur við sum hevur útflotið, skal verða brotið: og hvørt træílat skal verða reinsað í vatni.
13 Og tá ið hann, sum hevur eitt útflot, er reinsaður av sínum útfloti; tá skal hann upptelja til sín sjálvs sjey dagar fyri reinsan sína, og tváa klæðir síni, og baða kjøt sítt í rennandi vatni, og skal vera reinur.
14 Og á hinum áttanda degi skal hann taka til sín tvær turtildúgvur, ella tvær ungar dúgvur, og koma framfyri HARRAN at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, og geva prestinum tær:
15 Og presturin skal ofra tær, ta ēinu *til* eitt syndoffur, og hīna *til* eitt brennioffur; og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann frammi fyri HARRANUM fyri útflot hans.
16 Og um nakars mans paringar-sáð fari út frá honum, tá skal hann tváa alt kjøt sítt í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.
17 Og hvørt klæði, og hvørt skinn, hvará er paringar-sáðið, skal verða tvigið við vatni, og vera óreint inntil kvøldið.
18 Kvinnan eisini, hjá hvørji maður skal liggja *við* paringarsáði, tey skulu *bæði* baða *sær* í vatni, og vera órein inntil kvøldið.
19 ¶ Og um ein kvinna havi eitt útflot, *og* hennara útflot í hennara kjøti veri *seg* blóð, hon skal verða koyrd burturfrá sjey dagar: og hvørsumhelst *ið* nemur við hana skal vera óreinur inntil kvøldið.
20 Og hvørt ting, sum hon liggur uppiá í sínum atskilnaði, skal vera óreint: hvørt ting eisini, sum hon situr uppiá, skal vera óreint.
21 Og hvørsumhelst *ið* nemur við hennara beð, skal tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.
22 Og hvørsumhelst *ið* nemur við nakað ting, sum hon sat uppiá, skal tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.
23 Og um tað *veri* á *hennara* beði, ella á nøkrum tingi, hvará hon situr, tá ið hann nemur við tað, hann skal vera óreinur inntil kvøldið.
24 Og um nakar maður liggi við henni yvirhøvur, og hennara blómur veri uppiá honum, hann skal vera óreinur sjey dagar; og alt beðið, hvará hann liggur, skal vera óreint.
25 Og um ein kvinna havi eitt útflot av sínum blóði mangar dagar út um tíðina av sínum atskilnaði, ella um tað renni framum tíðina av hennara atskilnaði; allir dagarnir av útflotinum av hennara óreinsku skulu vera sum dagarnir av hennara atskilnaði: hon *skal vera* órein.
26 Hvørt beð, hvará hon liggur allar dagarnar av sínum útfloti, skal vera henni eins og beðið av hennara atskilnaði: og hvatsumhelst *ið* hon situr uppiá skal vera óreint, eins og óreinskan av hennara atskilnaði.
27 Og hvørsumhelst *ið* nemur við hasi tingini, skal vera óreinur, og skal tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið.
28 Men um hon verði reinsað av sínum útfloti, so skal hon upptelja til sín sjálvs sjey dagar, og eftir tað skal hon vera rein.
29 Og á hinum áttanda degi skal hon taka at sær tvær turtildúgvur, ella tvær ungar dúgvur, og koma við teimum at prestinum, til dyrnar á samkomutabernaklinum.
30 Og presturin skal ofra ta

ēinu *til* eitt syndoffur, og hīna *til* eitt brennioffur; og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hana frammi fyri HARRANUM fyri útflotið av hennara óreinsku.

31 Svá skulu tit atskilja børn Ísraels frá teirra óreinsku; at tey doyggi ikki í síni óreinsku, tá ið tey dálka tabernakkul mítt, sum *er* teirra millum.

32 Hetta *er* lógin um hann, sum hevur eitt útflot; og *um hann,* hvørs sáð fer frá honum, og er dálkaður harvið;

33 Og um hana, sum er sjúk av blómum sínum; og um hann, sum hevur eitt útflot; um mannin, og um kvinnuna; og um hann, sum liggur við henni, sum er órein.

KAPITUL 16

OG HARRIN talaði við Móses eftir deyðan hjá teimum tveimum sonunum hjá Aaroni, tá ið teir ofraðu frammi fyri HARRANUM, og doyðu;

2 Og HARRIN segði við Móses, Tala við Aaron, bróður tín, at hann komi ikki til allar tíðir inn í hitt heilaga *plássið* innum forhangið framfyri náðistólin, sum *er* uppiá ørkini; at hann doyggi ei: tí at eg vil birtast í skýgginum uppiá náðistólinum.

3 Svá skal Aaron koma inn í hitt heilaga *plássið:* við einum ungum ungtarvi til eitt syndoffur, og einum veðri til eitt brennioffur.

4 Hann skal fara í hin heilaga kyrtil, og hann skal hava lín brøkurnar uppiá sínum kjøti, og skal vera gyrdur við einum lín gyrðli, og við lín vavhúgvuni skal hann vera skrýddur: hesi *eru* heilag klæðir; tí skal hann tváa kjøt sítt í vatni, og *so* fara í tey.

5 Og hann skal taka av samkomu Ísraels barna tvey lomb av geitunum til eitt syndoffur, og ēin veðr til eitt brennioffur.

6 Og Aaron skal ofra sín ungtarv av syndofrinum, sum *er* fyri sjálvan hann, og gera eina sáttargerð fyri sjálvan seg, og fyri hús sítt.

7 Og hann skal taka tær tvær geitirnar, og framseta tær framfyri HARRAN *við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum.

8 Og Aaron skal kasta lutir yvir tær tvær geitirnar; ēin lut fyri HARRAN, og hīn lutin fyri syndabukkin.

9 Og Aaron skal koma við geitini, yvir hvørja HARRANS lutur fell, og ofra hana *til* eitt syndoffur.

10 Men geitin, á hvørja luturin fell til at vera syndabukkurin, skal verða framsett livandi framfyri HARRAN, til at gera eina sáttargerð við henni, *og* til at lata hana fara sum ein syndabukk inn í oyðuna.

11 Og Aaron skal koma við syndoffurs-ungtarvinum, sum *er* fyri sjálvan hann, og skal gera eina sáttargerð fyri sjálvan seg, og fyri hús sítt, og skal drepa syndoffurs-ungtarvin sum *er* fyri sjálvan hann:

12 Og hann skal taka eina roykilsis-pannu fulla av brennandi kolum av eldi oman av altarinum frammi fyri HARRANUM, og sínar hendur fullar av søtum roykilsi sligið smátt, og koma við *tí* innum forhangið:

13 Og hann skal seta roykilsið uppá eldin frammi fyri HARRANUM, at skýggið av roykilsinum má dekka náðistólin sum *er* uppiá vitnisburðinum, at hann doyggi ei:

14 Og hann skal taka av blóðinum av ungtarvinum, og sletta *tað* við sínum fingri uppá náðistólin eystanvert; og frammanfyri náðistólin skal hann sletta av blóðinum við sínum fingri sjey ferðir.

15 ¶ So skal hann drepa syndoffurs-geitina, sum *er* fyri fólkið, og koma við hennara blóði innum forhangið, og gera við tað blóðið eins og hann gjørdi við blóðið av ungtarvinum, og sletta tað uppá náðistólin, og frammanfyri náðistólin:

16 Og hann skal gera eina sáttargerð fyri hitt heilaga *plássið,* uppá grund av óreinsku Ísraels barna, og uppá grund av teirra misbrotum í øllum teirra syndum: og soleiðis skal hann gera fyri samkomu-tabernaklið, sum verður verandi teirra millum í miðjari óreinsku teirra.

17 Og tað skal eingin maður vera í samkomu-tabernaklinum tá ið hann fer inn at gera eina sáttargerð í tí heilaga *plássinum,* inntil hann komi út, og havi gjørt eina sáttargerð fyri sjálvan seg, og fyri húshald sítt, og fyri alla samkomu Ísraels.

18 Og hann skal fara út at altarinum sum *er* frammi fyri HARRANUM, og gera eina sáttargerð fyri tað; og skal taka av blóðinum av ungtarvinum, og av blóðinum av geitini, og koyra *tað* uppá hornini á altarinum runt umkring.

19 Og hann skal sletta av blóðinum uppá tað við sínum fingri sjey ferðir, og reinsa tað, og halga tað frá óreinsku Ísraels barna.

20 ¶ Og tá ið hann hevur lokið við at endursóna hitt heilaga *plássið,* og samkomu-tabernaklið, og altarið, skal hann koma við tí livandi geitini:

21 Og Aaron skal leggja báðar sínar hendur uppá høvdið á teirri livandi geitini, og játta yvir henni allar misgerðir Ísraels barna, og øll teirra misbrot í øllum teirra syndum, leggjandi tær uppá høvdið á geitini, og skal senda *hana* burtur við hondini á einum høgligum manni inn í oyðuna:

22 Og geitin skal bera uppiá sær allar teirra misgerðir at einum landi ikki bygt: og hann skal lata fara geitina í oyðuni.

23 Og Aaron skal koma inn í samkomu-tabernaklið, og skal fara úr línklæðunum, sum hann fór í tá ið hann fór inn í tað heilaga *plássið,* og skal lata tey vera har:

24 Og hann skal tváa kjøt sítt við vatni í tí heilaga plássinum, og fara í klæðir síni, og koma fram, og ofra sítt brennioffur, og brenniofrið hjá fólkinum, og gera eina sáttargerð fyri sjálvan seg, og fyri fólkið.

25 Og feittið av syndofrinum skal hann brenna uppiá altarinum.

26 Og hann, sum læt fara geitina sum syndabukkin, skal tváa klæðir síni, og baða kjøt sítt í vatni, og síðani koma inn í leirin.

27 Og ungtarvin *til* syndofrið, og geitina *til* syndofrið, hvørs blóð varð ført inn til at gera sáttargerð í tí heilaga *plássinum,* skal *ēin* bera fram útum leirin; og teir skulu brenna í eldinum teirra húðir, og teirra kjøt, og teirra gor.

28 Og hann, sum brennur tey, skal tváa klæðir síni, og baða kjøt sítt í vatni, og síðani skal hann koma inn í leirin.

29 ¶ Og *hetta* skal vera ein áseting um ævir hjá tykkum: *at* í hinum sjeynda mánaði, á hinum tíggjunda *degi* mánaðarins, skulu tit níva sálir tykkara, og einkið arbeiði gera yvirhøvur, *hvørt tað veri seg* ēin av tykkar egna landi, ella ein fremmandur sum útsitur tykkara millum:

30 Tí at á tí degi skal *presturin* gera eina sáttargerð fyri tykkum, til at reinsa tykkum, *at* tit mega vera reinir frá øllum tykkara syndum frammi fyri HARRANUM.

31 Tað *skal vera* ein hvíldarsabbatur hjá tykkum, og tit skulu

níva tykkara sálir, við eini áseting um ævir.

32 Og presturin, hvønn hann skal salva, og hvønn hann skal innvíga til at tæna í prests-embætinum í stað faðirs hansara, skal gera sáttargerðina, og skal fara í línklæðini, *enntá* tey heilagu klæðini:

33 Og hann skal gera eina sáttargerð fyri hin heilaga halgidóm, og hann skal gera eina sáttargerð fyri samkomu-tabernaklið, og fyri altarið, og hann skal gera eina sáttargerð fyri prestarnar, og fyri alt fólk samkomunnar.

34 Og hetta skal vera tykkum ein ævigtvarandi áseting, at gera eina sáttargerð fyri børn Ísraels fyri allar teirra syndir ēina ferð um árið. Og hann gjørdi eins og HARRIN skipaði Mósesi.

KAPITUL 17

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við Aaron, og við synir hansara, og við øll børn Ísraels, og sig við teir; Hetta *er* tað tingið sum HARRIN hevur boðið, sigandi,

3 Hvør maður sumhelst *ið tað veri seg* av Ísraels húsi, sum drepur ein oksa, ella lamb, ella geit, í leirinum, ella sum drepur *tað* uttanfyri leirin,

4 Og kemur ikki við tí at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, at ofra eitt offur at HARRANUM frammi fyri tabernakli HARRANS; blóð skal verða tilskrivað tí manninum; hann hevur úthelt blóð; og tann maðurin skal verða skorin av burturúr fólki hans:

5 Til tess endamáls, at Ísraels børn mega koma við sínum sláturofrum, sum teir ofra í tí opna akrinum, enntá at teir mega koma við teimum at HARRANUM, at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, at prestinum, og ofra tey *til* friðoffur at HARRANUM.

6 Og presturin skal sletta blóðið uppá altar HARRANS *við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum, og brenna feittið til ein søtan anga at HARRANUM.

7 Og teir skulu ei meira ofra síni sláturoffur at djevlum, eftir hvørjum teir hava farið horandi. Hetta skal vera ein áseting um ævir hjá teimum út gjøgnum ættir teirra.

8 ¶ Og tú skalt siga við teir, Hvørsumhelst maður *ið tað veri seg* av húsi Ísraels, ella av hinum fremmandu sum útisita tykkara millum, sum ofrar eitt brennioffur, ella eitt sláturoffur,

9 Og kemur ikki við tí at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, at ofra tað at HARRANUM; enntá tann maðurin skal verða skorin av burturúr fólki hans.

10 ¶ Og hvørsumhelst maður *ið tað veri seg* av húsi Ísraels, ella av hinum fremmandu sum útisita tykkara millum, sum etur nakað háttarlag av blóði; eg vil enntá seta mítt andlit ímóti teirri sálini sum etur blóð, og vil skera hann av burturúr fólki hans.

11 Tí at lív kjøtsins *er* í blóðinum: og eg havi givið tað til tykkum uppá altarið til at gera eina sáttargerð fyri sálir tykkara: tí at tað *er* blóðið *sum* ger eina sáttargerð fyri sálina.

12 Tí segði eg við børn Ísraels, Eingin sál av tykkum skal eta blóð, eiheldur skal nakar fremmandur, sum útisitur tykkara millum, eta blóð.

13 Og hvørsumhelst maður *ið tað veri seg* av børnum Ísraels, ella av hinum fremmandu sum útisita tykkara millum, sum veiðir og fangar nakað djór ella fugl, sum kann verða etið; hann skal enntá hella út blóðið av tí, og dekka tað við støvi.

14 Tí at *tað er* lívið hjá øllum kjøti; blóðið av tí *er* fyri lív tess:

tí segði eg við børn Ísraels, Tit skulu eta blóðið av ongum háttarlagi av kjøti: tí at lívið hjá øllum kjøti *er* blóð tess: hvørsumhelst *ið* etur tað skal verða skorin av.

15 Og hvør sál sum etur tað sum doyði *av sær sjálvum,* ella tað sum varð skrætt *við djórum, hvørt tað veri* ēin av tykkar egna landi, ella ein fremmandur, hann skal bæði tváa klæðir síni, og baða *sær* í vatni, og vera óreinur inntil kvøldið: tá skal hann vera reinur.

16 Men um hann tvái *tey* ikki, ella baði kjøt sítt; tá skal hann bera sína misgerð.

KAPITUL 18

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Eg eri HARRIN Guð tykkara.

3 Eftir gerðum Egyptalands, hvarí tit dvaldust, skulu tit ikki gera: og eftir gerðum Cānaans lands, hvagar eg føri tykkum, skulu tit ikki gera: eiheldur skulu tit ganga í teirra regluskipanum.

4 Tit skulu gera mínar dómar, og halda mínar regluskipanir, til at ganga harí: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

5 Tit skulu tí halda mínar ásetingar, og mínar dómar: hvørjar, um ein maður geri, hann skal liva í teimum: eg *eri* HARRIN.

6 ¶ Eingin av tykkum skal nærkast til nakran sum er nær í slekt við hann, til at avdekka *teirra* nakni: eg *eri* HARRIN.

7 Naknina hjá faðir tínum, ella naknina hjá móður tíni, skalt tú ikki avdekka: hon *er* móðir tín; tú skalt ikki avdekka hennara nakni.

8 Naknina hjá ektakonu faðirs tíns skalt tú ikki avdekka: tað *er* nakni faðirs tíns.

9 Naknina hjá systur tíni, dóttur faðirs tíns, ella dóttur at móður tíni, *hvørt hon veri seg* fødd heima, ella fødd burturi, *enntá* teirra nakni skalt tú ikki avdekka.

10 Naknina hjá dóttur sonar tíns, ella hjá dóttur dóttur tínar, *enntá* teirra nakni skalt tú ikki avdekka: tí at teirra *er* tín egna nakni.

11 Naknina hjá dóttur konu faðirs tíns, gitin av faðir tínum, hon *er* systir tín, tú skalt ikki avdekka hennara nakni.

12 Tú skalt ikki avdekka naknina hjá systur faðirs tíns: hon *er* nærskyldkona faðirs tíns.

13 Tú skalt ikki avdekka nakni systur móður tínar: tí at hon *er* nærskyldkona móður tínar.

14 Tú skalt ikki avdekka nakni bróðurs faðirs tíns, tú skalt ikki nærkast til konu hansara: hon *er* faðirbróðurkona tín.

15 Tú skalt ikki avdekka naknina hjá verdóttur tíni: hon *er* kona sonar tíns; tú skalt ikki avdekka hennara nakni.

16 Tú skalt ikki avdekka nakni konu bróðurs tíns: tað *er* nakni bróðurs tíns.

17 Tú skalt ikki avdekka naknina hjá eini kvinnu og dóttur hennara, eiheldur skalt tú taka dóttur sonar hennara, ella dóttur dóttur hennara, til at avdekka hennara nakni; *tí at* tær *eru* nærskyldkonur hennara: tað *er* vondska.

18 Eiheldur skalt tú taka eina konu *aftur*at systur hennara, til at níva *hana,* til at avdekka hennara nakni, umframt hīna í hennara lívs*tíð*.

19 Eisini tú skalt ikki nærkast at eini kvinnu til at avdekka hennara nakni, so leingi sum hon er sett til viks fyri sín óreinleika.

20 Haraftrat skalt tú ikki liggja kjøtligani við ektakonu næsta

tíns, til at dálka teg sjálvan við henni.

21 Og tú skalt ikki lata nakað av tínum sáði fara ígjøgnum *eldin* til Molechs, eiheldur skalt tú halgispotta navn Guðs tíns: eg *eri* HARRIN.

22 Tú skalt ikki liggja við mannkyni, eins og við kvennkyni: tað *er* andstygd.

23 Eiheldur skalt tú liggja við nøkrum djóri til at dálka teg sjálvan harvið: eiheldur skal nøkur kvinna standa frammanfyri einum djóri til at liggja niðri harfyri: tað *er* ørkymlan.

24 Dálkið ikki tit tykkum sjálvar í nøkrum av hesum tingunum: tí at í øllum hesum eru tjóðirnar dálkaðar, sum eg kastaði út frammi fyri tykkum:

25 Og landið er dálkað: tessvegna heimsøki eg misgerð tess omanyvir tað, og landið sjálvt froysir út hennar íbúgvar.

26 Tit skulu tí halda mínar ásetingar og mínar dómar, og skulu ikki fremja *nakra* av hesum andstygdunum; *hvørki* nakar av tykkar egnu tjóð, ella nakar fremmandur sum útisitur tykkara millum:

27 (Tí at allar hesar andstygdir hava landsins menn gjørt, sum *vóru* undan tykkum, og landið er dálkað;)

28 At landið spýggi ikki tykkum út eisini, tá ið tit dálka tað, eins og tað spýði út tjóðirnar sum *vóru* undan tykkum.

29 Tí at hvørsumhelst *ið* skal fremja nakra av hesum andstygdunum, enntá sálirnar sum fremja *tær* skulu verða skornar av burturúr fólki teirra.

30 Tí skulu tit halda mína regluskipan, at *tit* fremji ikki *nakra ta ẽinastu* av hesum andstyggiligu venjunum, sum vórðu framdar undan tykkum, og at tit dálki ikki tykkum sjálvar harí: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

KAPITUL 19

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við alla samkomu Ísraels barna, og sig við teir, Tit skulu vera heilagir: tí at eg, HARRIN Guð tykkara, *eri* heilagur.

3 ¶ Tit skulu óttast hvør maður móður sína, og faðir sín, og halda mínar sabbatar: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

4 ¶ Snúgvið tit ikki at avgudum, ella gerið til tykkara sjálvs bræddar gudar: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

5 ¶ Og um tit ofri eitt sláturoffur av friðofrum at HARRANUM, tit skulu ofra tað av tykkar egna vilja.

6 Tað skal verða etið hin sama dagin *sum* tit ofra tað, og á morgindeginum: og um okkurt verði eftir inntil triðja dagin, tað skal verða brent í eldinum.

7 Og um tað verði etið yvirhøvur á tí triðja deginum, tað *er* andstyggiligt; tað skal ikki verða góðkent.

8 Tí skal *hvør tann,* sum etur tað, bera sína misgerð, av tí at hann hevur halgispottað hitt halgaða ting HARRANS: og tann sálin skal verða skorin av burturúr fólki hans.

9 ¶ Og tá ið tit heysta heyst lands tykkara, skalt tú ikki heilvegis heysta hjørnˇ akurs tíns, eiheldur skalt tú savna fínrakingar heysts tíns.

10 Og tú skalt ikki fínhenta víngarð tín, eiheldur skalt tú savna *hvørt* vínber víngarðs tíns; tú skalt lata tey vera til hin fátæka og fremmanda: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

11 ¶ Tit skulu ikki stjala, eiheldur fara svikaliga at, eiheldur lúgva hvør fyri øðrum.

12 ¶ Og tit skulu ikki svørja við navn mítt falsliga, eiheldur skalt

tú halgispotta navn Guðs tíns: eg *eri* HARRIN.

13 ¶ Tú skalt ikki snýta næsta tín, eiheldur ræna *hann:* lønin hjá honum, sum er leigaður, skal ikki verða *verandi* hjá tær *í* alla nátt inntil morgunin.

14 ¶ Tú skalt ikki bølbiðja hin deyva, ella seta ein snávingarstein frammi fyri tí blinda, men skalt óttast Guð tín: eg *eri* HARRIN.

15 ¶ Tit skulu einkið órættvísi gera í dómi: tú skalt ikki meta persón hins fátæka, ella æra persón hins mektiga: *men* í rættvísi skalt tú døma næsta tín.

16 ¶ Tú skalt ikki fara niðan og oman *sum* eitt sleygivætti millum fólks tíns: eiheldur skalt tú standa ímóti blóði næsta tíns: eg *eri* HARRIN.

17 ¶ Tú skalt ikki hata bróður tín í hjarta tínum: tú skalt í øllum førum harta bróður tín, og ikki loyva synd uppiá honum.

18 ¶ Tú skalt ikki hevna, ella bera nakað agg ímóti børnum fólks tíns, men tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg: eg *eri* HARRIN.

19 ¶ Tit skulu halda mínar ásetingar. Tú skalt ikki lata tín fenað parast við einum ymiskum slagi: tú skalt ikki sáa tín akur við blandaðum sáði: eiheldur skal eitt klæði, blandað av líni og ullintum, koma uppá teg.

20 ¶ Og hvørsumhelst *ið* liggur kjøtligani við eini kvinnu sum *er* ein tænastugenta, trúlovað til ektamans, og ikki yvirhøvur endurloyst, ella frælsi givið henni; hon skal verða húðflett; tey skulu ikki verða tikin av lívi, av tí at hon var ikki frí.

21 Og hann skal koma við sínum misbrotsofri at HARRANUM, at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, *enntá* einum veðri til eitt misbrotsoffur.

22 Og presturin skal gera eina sáttargerð fyri hann við misbrotsoffurs-veðrinum frammi fyri HARRANUM fyri hansara synd sum hann hevur gjørt: og syndin, sum hann hevur gjørt, skal verða fyrigivin honum.

23 ¶ Og tá ið tit skulu koma inn í landið, og skulu hava plantað alskyns trø til matnað, tá skulu tit telja ávøkstin av tí sum óumskornan: trý ár skal hann vera tær sum óumskorin: hann skal ei verða etin av.

24 Men í tí fjórða árinum skal allur ávøksturin av tí vera heilagur til at prísa HARRANUM *við*.

25 Og í tí fimta árinum skulu tit eta av ávøkstinum av tí, at tað má veita tykkum ávøkstin harav: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

26 ¶ Tit skulu ikki eta *nakað ting* við blóðinum: eiheldur skulu tit brúka rúnagandan, ella geva ans eftir tíðum.

27 Tit skulu ikki runda hjørnini á høvdum tykkara, eiheldur skalt tú skemma hjørnini á skeggi tínum.

28 Tit skulu ikki gera nakrar skeringar í kjøt tykkara fyri tey deyðu, ella prenta nøkur merkir uppá tykkum: eg *eri* HARRIN.

29 ¶ Skøkjuger ikki dóttur tína, til at elva henni at vera ein hora; at ikki landið falli til hordóms, og landið gerist fult av vondsku.

30 ¶ Tit skulu halda mínar sabbatar, og virðingaróttast mín halgidóm: eg *eri* HARRIN.

31 ¶ Gáið ikki eftir teimum sum hava vælkunnugar andar, eiheldur søkið eftir gandakøllum, til at verða dálkaðir av teimum: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

32 ¶ Tú skalt rísa upp frammi fyri tí gráa høvdinum, og æra andlitið hjá tí gamla manninum, og óttast Guð tín: eg *eri* HARRIN.

33 ¶ Og um ein fremmandur

útisiti hjá tær í landi tykkara, tit skulu ikki plága hann.

34 *Men* hin fremmandi, sum dvølist hjá tykkum, skal vera tykkum sum ein, føddur tykkara millum, og tú skalt elska hann sum sjálvan teg; tí at tit vóru fremmandir í Egyptalandi: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

35 ¶ Tit skulu einkið órættvísi gera í dómi, í stikku, í vekt, ella í máti.

36 Rættar vágskálir, rættar vektir, eina rætta ē´phŭh, og eina rætta hin, skulu tit hava: eg *eri* HARRIN Guð tykkara, sum førdi tykkum út úr Egyptalandi.

37 Tí skulu tit geva ans *eftir* øllum mínum ásetingum, og øllum mínum dómum, og gera tey: eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 20

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Aftur skalt tú siga til Ísraels barna, Hvørsumhelst *ið hann veri seg* av Ísraels børnum, ella av hinum fremmandu sum útisita í Ísrael, sum gevur *nakað* av sáði sínum til Molechs; hann skal vissuligani verða tikin av lívi: landsins fólk skulu steina hann við steinum.

3 Og eg vil seta mítt andlit ímóti tí manninum, og vil skera hann av burturúr fólki hans; av tí at hann hevur givið av sáði sínum til Molechs, til at dálka mín halgidóm, og til at halgispotta mítt heilaga navn.

4 Og um landsins fólk á nakran hátt fjali síni eygu frá manninum, tá ið hann gevur av sínum sáði til Molechs, og drepi hann ei:

5 Tá vil eg seta mítt andlit ímóti tí manninum, og ímóti familju hansara, og vil skera hann av, og allar sum fara horandi eftir honum, til at fremja hordóm við Molechi, burturúr fólki teirra.

6 ¶ Og tann sál sum snýr eftir slíkum sum hava vælkunnugar andar, og eftir gandakøllum, til at fara horandi eftir teimum, eg vil enntá seta mítt andlit ímóti tí sálini, og vil skera hann av burturúr fólki hans.

7 ¶ Halgið tykkum sjálvar tessvegna, og verið tit heilagir: tí at eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

8 Og tit skulu halda mínar ásetingar, og gera tær: eg *eri* HARRIN sum halgi tykkum.

9 ¶ Tí at hvør tann, sum bannar faðir sín ella móður sína, skal vissuliga verða tikin av lívi: hann hevur bannað faðir sín ella móður sína; hansara blóð *skal vera* uppiá honum.

10 ¶ Og tann maður sum fremur hordóm við ektakonu *annars* mans, *enntá hann* sum fremur hordóm við ektakonu næsta síns, horkallurin og horinnan skulu vissuligani verða tikin av lívi.

11 Og tann maður, sum liggur við konu faðirs síns, hevur avdekkað nakni faðirs síns: bæði av teimum skulu vissuliga verða tikin av lívi; teirra blóð *skal vera* uppiá teimum.

12 Og um ein maður liggi við verdóttur síni, bæði av teimum skulu vissuliga verða tikin av lívi: tey hava virkað ørkymlan; teirra blóð *skal vera* uppiá teimum.

13 Um ein maður eisini liggi við mannkyni, eins og hann liggur við eini kvinnu, báðir av teimum hava framt eina andstygd: teir skulu vissuliga verða tiknir av lívi; teirra blóð *skal vera* uppiá teimum.

14 Og um ein maður taki eina konu og móður hennara, tað *er* vondska: tey skulu verða brend við eldi, bæði hann og tær; at tað veri eingin vondska tykkara millum.

15 Og um ein maður liggi við einum djóri, hann skal vissuligani verða tikin av lívi: og tit skulu vega djórið.

16 Og um ein kvinna nærkist at nøkrum djóri, og liggi niðri harfyri, tú skalt drepa kvinnuna, og djórið: tey skulu vissuligani verða tikin av lívi; teirra blóð *skal vera* uppiá teimum.

17 Og um ein maður skal taka systur sína, dóttur faðirs síns, ella dóttur móður sínar, og síggja hennara nakni, og hon síggi hansara nakni; tað *er* ein vondur lutur; og tey skulu verða skorin av í eygsjón fólks síns: hann hevur avdekkað nakni systur sínar; hann skal bera sína misgerð.

18 Og um ein maður skal liggja við eini kvinnu, havandi sjúkdóm sín, og skal avdekka hennara nakni; hann hevur avdekkað hennara keldu, og hon hevur avdekkað kelduna av sínum blóði: og bæði av teimum skulu verða skorin av burturúr fólki teirra.

19 Og tú skalt ikki avdekka naknina hjá systur móður tínar, ella systur faðirs tíns: tí at hann avdekkar nærskyldfólk sítt: tey skulu bera sína misgerð.

20 Og um ein maður skal liggja við konu foreldrabróðurs síns, hann hevur avdekkað naknina hjá foreldrabróður sínum: tey skulu bera sína synd; tey skulu doyggja barnleys.

21 Og um ein maður skal taka konu bróðurs síns, tað *er* eitt óreint ting: hann hevur avdekkað nakni bróðurs síns; tey skulu vera barnleys.

22 ¶ Tit skulu tí halda allar mínar ásetingar, og allar mínar dómar, og gera tey: at landið, hvagar eg føri tykkum at búgva harí, spýggi tykkum ikki út.

23 Og tit skulu ikki ganga í háttarløgum tjóðarinnar, hvørja eg kasti út undan tykkum: tí at tey framdu allar hesar lutir, og tessvegna stóðst mær við tey.

24 Men eg havi sagt við tykkum, Tit skulu arva land teirra, og eg vil geva tykkum tað til at ognast tað, eitt land sum flýtur við mjólk og hunangi: eg *eri* HARRIN Guð tykkara, sum havi atskilt tykkum frá *øðrum* fólki.

25 Tit skulu tí seta mun ímillum rein djór og órein, og ímillum óreinar fuglar og reinar: og tit skulu ikki gera tykkara sálir andstyggiligar við djóri, ella við fugli, ella við nøkrum háttarlagi av livandi tingi sum skríður á jørðini, sum eg havi atskilt frá tykkum sum óreint.

26 Og tit skulu vera mær heilagir: tí at eg, HARRIN, *eri* heilagur, og havi atskilt tykkum frá *øðrum* fólki, at tit skuldu vera mínir.

27 ¶ Ein maður eisini, ella kvinna, sum hevur ein vælkunnugan anda, ella sum er ein gandakallur, skal vissuligani verða tikin av lívi: tey skulu steina tey við steinum: teirra blóð *skal vera* uppiá teimum.

KAPITUL 21

OG HARRIN segði við Móses, Tala við prestarnar, synir Aarons, og sig við teir, Tað skal eingin verða dálkaður fyri hinar deyðu millum fólks síns:

2 Uttan fyri sítt nærskyldfólk, sum er nær honum, *tað er,* fyri móður sína, og fyri faðir sín, og fyri son sín, og fyri dóttur sína, og fyri bróður sín,

3 Og fyri sína systur eina jomfrúgv, sum er nær honum, sum ongan ektamann hevur havt; fyri hana kann hann verða dálkaður.

4 *Men* hann skal ikki dálka seg, *verandi* ein fremsti maður millum fólks síns, til at vanhalga seg.

5 Teir skulu ikki gera skallutleika uppiá høvdi sínum, eiheldur skulu teir raka av hjørnið á skeggi sínum, ella gera nakrar skeringar í kjøt sítt.

6 Teir skulu vera Guði sínum

heilagir, og ikki halgispotta navn Guðs síns: tí at offur^ HARRANS gjørd við^ eldi, *og* breyð Guðs teirra, ofra teir: tí skulu teir vera heilagir.

7 Teir skulu ikki taka eina ektakonu, *sum er* ein hora, ella vanheilag; eiheldur skulu teir taka eina kvinnu, koyrd burtur frá manni sínum: tí at hann *er* heilagur at Guði sínum.

8 Tú skalt halga hann tessvegna; tí at hann ofrar breyð Guðs tíns: hann skal vera heilagur at tær: tí at eg, HARRIN, sum halgi tykkum, *eri* heilagur.

9 ¶ Og dóttirin hjá nøkrum presti, um hon vanhalgi seg sjálva við at spæla horan, hon vanhalgar faðir sín: hon skal verða brend við eldi.

10 Og *hann sum er* høvuðspresturin millum bróðra sína, uppá hvørs høvur salvingar-oljan varð helt, og sum er innvígaður til at fara í klæðini, skal ikki avdekka høvur sítt, ella skræða klæðir síni;

11 Eiheldur skal hann fara inn til nakran deyðan kropp, ella dálka seg sjálvan fyri faðir sín, ella fyri móður sína;

12 Eiheldur skal hann fara út úr halgidóminum, ella halgivanvirða halgidóm Guðs síns; tí at krúnan av salvingar-olju Guðs hansara *er* uppiá honum: eg *eri* HARRIN.

13 Og hann skal taka eina ektakonu í jomfrúdómi hennara.

14 Eina einkju, ella eina fráskilda kvinnu, ella vanheilaga, *ella* eina skøkju, hesar skal hann ikki taka: men hann skal taka eina jomfrúgv av sínum egna fólki til ektakonu.

15 Eiheldur skal hann vanhalga sáð sítt millum fólks síns: tí at eg, HARRIN, halgi hann.

16 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

17 Tala við Aaron, sigandi, Hvørsumhelst *ið hann veri* av sáði tínum í ættum teirra, sum hevur *nakað* lýti, lat hann ikki nærkast at ofra breyð Guðs síns.

18 Tí at hvørsumhelst maður *ið hann veri,* sum hevur eitt lýti, hann skal ikki nærkast: ein blindur maður, ella ein lamin, ella hann sum hevur eina flata nøs, ella nakað ting til yvirs,

19 Ella ein maður sum er fótbrotin, ella hondbrotin,

20 Ella ryggbogin, ella ein dvørgur, ella sum hevur eitt lýti í eyga sínum, ella veri *seg* skrubbutur, ella skruvaður, ella hevur steinar sínar brotnar;

21 Eingin maður, sum hevur eitt lýti av sáði Aarons prests, skal koma nær til at ofra ofrini hjá HARRANUM gjørd við^ eldi: hann hevur eitt lýti; hann skal ikki koma nær at ofra breyð Guðs síns.

22 Hann skal eta breyð Guðs síns, *bæði* av tí mest heilaga, og av tí heilaga.

23 Einans hann skal ikki fara inn at forhanginum, ella koma nær at altarinum, av tí at hann hevur eitt lýti; at hann vanhalgi ikki mínar halgidómar: tí at eg, HARRIN, halgi teir.

24 Og Móses segði *tað* við Aaron, og til sona hansara, og við øll børn Ísraels.

KAPITUL 22

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við Aaron og til sona hansara, at teir atskilji seg sjálvar frá hinum heilagu tingum Ísraels barna, og at teir halgispotti ikki mítt heilaga navn *í teimum tingunum* sum teir halga mær: eg *eri* HARRIN.

3 Sig við teir, Hvørsumhelst *ið hann veri seg* av øllum sáði tykkara millum ættir tykkara, sum fer at hinum heilagu tingunum, sum

Ísraels børn halga at HARRANUM, havandi sín óreinleika uppiá sær, handa sál skal verða skorin av frá nærveru míni: eg *eri* HARRIN.

4 Hvør maður sumhelst av sáði Aarons, *sum er* ein spitalskur, ella hevur eitt rennandi útflot; hann skal ikki eta av teimum heilagu tingunum, inntil hann verði reinur. Og hvør*iðenn* nemur við nakað ting *sum er* óreint *av* teimum deyðu, ella ein mann, hvørs sáð fer frá honum;

5 Ella hvørsumhelst *ið* nemur við nakað skriðkykt, við hvørjum hann kann verða gjørdur óreinur, ella ein mann, av hvørjum hann kann taka óreinleika, hvønnsumhelst óreinleika hann hevur;

6 Tann sál, sum hevur nomið við nakað slíkt, skal vera órein inntil aftan, og skal ikki eta av teimum heilagu tingunum, uttan hann tvái kjøt sítt við vatni.

7 Og tá ið sólin er niðri, skal hann vera reinur, og skal síðani eta av teimum heilagu tingunum; av tí at tað *er* matur hansara.

8 Tað sum doyr av sær sjálvum, ella verður skrætt *við djórum*, skal ikki hann eta til at dálka seg sjálvan harvið: eg *eri* HARRIN.

9 Teir skulu tí halda mína regluskipan, at ikki teir beri synd fyri tað, og doyggi harfyri, um teir vanhalgi tað: eg, HARRIN, halgi teir.

10 Tað skal eingin fremmandur eta *av* tí heilaga tinginum: ein útiseti hjá prestinum, ella ein leigaður tænari, skal ikki eta *av* tí heilaga tinginum.

11 Men um presturin keypi *nakra* sál við peningi sínum, hann skal eta av tí, og hann sum er føddur í húsi hansara: teir skulu eta av mati hansara.

12 Um dóttir prestsins eisini verði *gift* einum fremmandum, hon má ikki eta av einum ofri av teimum heilagu tingunum.

13 Men um dóttir prestsins veri ein einkja, ella fráskild, og havi einkið barn, og er komin aftur at húsi faðirs síns, sum í ungdómi sínum, hon skal eta av mati faðirs síns: men tað skal eingin fremmandur eta harav.

14 ¶ Og um ein maður eti *av* tí heilaga tinginum óavvitanarligani, tá skal hann koyra fimta*part*in harav at tí, og skal geva prestinum *tað* við tí heilaga tinginum.

15 Og teir skulu ikki vanhalga hini heilagu ting Ísraels barna, sum teir ofra at HARRANUM;

16 Ella loyva teimum at bera misgerðar-misbrotið, tá ið teir eta síni heilagu ting: tí at eg, HARRIN, halgi teir.

17 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

18 Tala við Aaron, og til synir hansara, og við øll børn Ísraels, og sig við teir, Hvatsumhelst *ið hann veri seg* av Ísraels húsi, ella av teimum fremmandu í Israel, sum vil ofra sítt tilbiðjanar-offur fyri øll síni heitstreingir, og fyri síni fríviljaoffur, sum teir vilja ofra at HARRANUM til eitt brenni-offur;

19 *Tit skulu ofra* av tykkara egna vilja eitt kallkyns uttan lýti, av búfflunum, av seyðunum, ella av geitunum.

20 *Men* hvatsumhelst *ið* hevur eitt lýti, *tað* skulu tit ikki ofra: tí at tað skal ikki verða góðtakiligt fyri tykkum.

21 Og hvørsumhelst *ið* ofrar eitt friðofra-sláturoffur at HARRANUM, til at fullføra *sítt* heitstreingi, ella eitt fríviljaoffur í búfflum, ella seyðum, tað skal vera fullkomið *fyri* at verða góðtikið; tað skal einkið lýti vera hjá.

22 Blint, ella brotið, ella vanført, ella havandi eitt kýli, ella skrubbut, ella skruvað, tit skulu ikki ofra hesi at HARRANUM, ella

gera eitt offur viðˆ eldi av teimum uppiá altarinum at HARRANUM.

23 Ella ein ungtarv ella eitt lamb, sum hevur nakað ting til yvirs ella vantandi í pørtum sínum, tað kanst tú ofra *til* eitt fríviljaoffur; men til eitt heitstreingi skal tað ikki verða góðtikið.

24 Tit skulu ikki ofra at HARRANUM tað sum er knúskað, ella meltað, ella brotið, ella skorið; eiheldur skulu tit gera *nakað offur harav* í tykkara landi.

25 Eiheldur frá hondini á einum fremmandum skulu tit ofra breyð Guðs tykkara av nøkrum av hesum; av tí at teirra spilla *er* í teimum, *og* lýtir *veri* í teimum: tey skulu ikki verða góðtikin fyri tykkum.

26 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

27 Tá ið ein ungtarvur, ella ein seyður, ella ein geit, verður ført fram, tá skal tað vera sjey dagar undir móðurini; og frá tí áttanda deginum og haðanífrá skal tað vera góðtikið til eitt offur gjørt viðˆ eldi at HARRANUM.

28 Og *hvørt tað veri seg* kúgv ella ær, tit skulu ikki drepa hana og hennara unga bæði í ēinum degi.

29 Og tá ið tit vilja ofra eitt takkargerðar-sláturoffur at HARRANUM, ofrið *tað* av tykkara egna vilja.

30 Á tí sama deginum skal tað verða etið upp; tit skulu einkið eftirlata av tí inntil morgindagin: eg *eri* HARRIN.

31 Tí skulu tit halda míni boð, og gera tey: eg *eri* HARRIN.

32 Eiheldur skulu tit halgivanvirða mítt heilaga navn; men eg vil vera halgaður Ísraels barna millum: eg *eri* HARRIN sum halgi tykkum,

33 Sum førdi tykkum út úr Egyptalandi, til at vera Guð tykkara: eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 23

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, *Viðvíkjandi* hátíðum HARRANS, sum tit skulu yvirlýsa *at vera* heilagar samankallingar, *enntá* hesar *eru* mínar hátíðir.

3 Seks dagar skal arbeiði verða gjørt: men hin sjeyndi dagurin *er* hvíldar-sabbaturin, ein heilag samankalling; tit skulu einkið arbeiði gera *harí:* hann *er* sabbatur HARRANS í øllum bústøðum tykkara.

4 ¶ Hetta eru hátíðir HARRANS, *enntá* heilagar samankallingar, ið tit skulu yvirlýsa í teirra tíðum.

5 Í hinum fjúrtanda *degi* hins fyrsta mánaðar um aftan *er* umleyp HARRANS.

6 Og á tí fimtanda deginum av tí sama mánaðinum *er* hátíðin av ósúrgaðum breyði at HARRANUM: sjey dagar mugu tit eta ósúrgað breyð.

7 Í tí fyrsta deginum skulu tit hava eina heilaga samankalling: tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera harí.

8 Men tit skulu ofra eitt offur gjørt viðˆ eldi at HARRANUM sjey dagar: í tí sjeynda deginum *er* ein heilag samankalling: tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera *harí.*

9 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

10 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Tá ið tit verði komnir inn í landið sum eg gevi at tykkum, og skulu heysta heyst tess, tá skulu tit koma við einum bundi av frumávøkstunum av tykkara heysti at prestinum:

11 Og hann skal reiggja bundinum frammi fyri HARRANUM, at verða góðtikið fyri tykkum: á morgindeginum eftir sabbatin skal presturin reiggja tí.

12 Og tit skulu ofra tann dagin, tá ið tit reiggja bundinum, eitt fyrsta árs veðurlamb uttan lýti til eitt brennioffur at HARRANUM.
13 Og matofrið harav *skal vera* tveir tíggjunddeilir av finum mjøli blandað við olju, eitt offur gjørt viðˆ eldi at HARRANUM *til* ein søtan anga: og drykkofrið harav *skal vera* av víni, fjórðings*part*urin av eini hín.
14 Og tit skulu eta hvørki breyð, ella turkað korn, ella grøn øks, inntil sjálvan hin sama dagin sum tit hava komið við einum ofri at Guði tykkara: *tað skal vera* ein áseting um ævir út gjøgnum ættir tykkara í øllum bústøðum tykkara.
15 ¶ Og tit skulu telja tykkum frá morgindeginum eftir sabbatin, frá deginum sum tit komu við reiggioffurs-bundinum; sjey sabbatar skulu vera fullførdir:
16 Alt at morgindeginum eftir hin sjeynda sabbatin skulu tit upptelja fimti dagar; og tit skulu ofra eitt nýtt matoffur at HARRANUM.
17 Tit skulu bera út úr tykkara bústøðum tvey reiggi-heilbreyð á tveir tíggjunddeilir: tey skulu vera av finum mjøli; tey skulu vera bakaði við súrdeiggi; *tey eru* frumávøkstirnir at HARRANUM.
18 Og tit skulu ofra við breyðinum sjey fyrsta árs lomb uttan lýti, og ēin ungan ungtarv, og tveir veðrar: teir skulu vera *til* eitt brennioffur at HARRANUM, við teirra matofri, og teirra drykkofrum, *enntá* eitt offur gjørt viðˆ eldi, av søtum anga at HARRANUM.
19 So skulu tit sláturofra ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur, og tvey fyrsta árs lomb til eitt sláturoffur av friðofrum.
20 Og presturin skal reiggja teimum við frumávakstaˇ-breyðinum *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM, við teimum tveimum lombunum: tey skulu vera heilag fyri HARRANUM hjá prestinum.
21 Og tit skulu yvirlýsa á sjálvum tí sama deginum, *at* tað má vera ein heilag samankalling hjá tykkum: tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera *harí: tað skal vera* ein áseting um ævir í øllum tykkara bústøðum út gjøgnum ættir tykkara.
22 ¶ Og tá ið tit skera heyst lands tykkara, skalt tú ikki gera reina rudding av hjørnunum á akri tínum, tá ið tú skert, eiheldur skalt tú savna nakra fínraking av heysti tínum: tú skalt eftirlata tey at hinum fátæka, og til hin fremmanda: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.
23 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
24 Tala við børn Ísraels, sigandi, Í tí sjeynda mánaðinum, á hinum fyrsta *degi* mánaðarins, skulu tit hava ein sabbat, eitt lúðrablásturs-minni, eina heilaga samankalling.
25 Tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera *harí:* men tit skulu ofra eitt offur gjørt viðˆ eldi at HARRANUM.
26 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
27 Eisini á tí tíggjunda *deginum* av hesum sjeynda mánaðinum *skal vera* ein sáttargerðar-dagur: tað skal vera ein heilag samankalling hjá tykkum; og tit skulu níva tykkara sálir, og ofra eitt offur gjørt viðˆ eldi at HARRANUM.
28 Og tit skulu einkið arbeiði gera í sjálvum tí sama deginum: tí at tað *er* ein sáttargerðar-dagur, til at gera eina sáttargerð fyri tykkum frammi fyri HARRANUM Guði tykkara.
29 Tí at hvørsumhelst sál *ið tað veri seg,* sum skal ikki verða nívd í tí sama deginum, hann skal verða skorin av frá millum fólks hansara.

30 Og hvørsumhelst sál *tað veri seg*, sum ger nakað arbeiði í tí sama deginum, hina somu sál vil eg oyða burturúr fólki hansara.

31 Tit skulu einkið háttarlag av arbeiði gera: *tað skal vera* ein áseting um ævir út gjøgnum ættir tykkara í øllum tykkara bústøðum.

32 Hann *skal vera* tykkum ein hvíldar-sabbatur, og tit skulu níva tykkara sálir: á hinum níggjunda *degi* mánaðarins um aftan, frá aftan *fram*at aftan, skulu tit feira tykkara sabbat.

33 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

34 Tala við børn Ísraels, sigandi, Hin fimtanda dagin av tí sjeynda mánaðinum *skal vera* tabernakla-hátíðin *í* sjey dagar at HARRANUM.

35 Á tí fyrsta deginum *skal vera* ein heilag samankalling: tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera *harí*.

36 Sjey dagar skulu tit ofra eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM: á tí áttanda deginum skal vera ein heilag samankalling hjá tykkum; og tit skulu ofra eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM: tað *er* ein hátíðar-samansavning; *og* tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera *harí*.

37 Hetta *eru* hátíðir HARRANS, sum tit skulu yvirlýsa *at vera* heilagar samankallingar, at ofra eitt offur gjørt við eldi at HARRANUM, eitt brennioffur, og eitt matoffur, eitt sláturoffur, og drykkoffur, hvørt ting uppá sín dag:

38 Umframt HARRANS sabbatar, og umframt tykkara gávur, og umframt tykkara heitstreingir, og umframt øll tykkara fríviljaoffur, sum tit geva at HARRANUM.

39 Eisini í tí fimtanda deginum av tí sjeynda mánaðinum, tá ið tit hava savnað inn landsins ávøkst, skulu tit halda eina hátíð at HARRANUM sjey dagar: á tí fyrsta deginum *skal vera* ein sabbatur, og á tí áttanda deginum *skal vera* ein sabbatur.

40 Og tit skulu taka tykkum á tí fyrsta deginum bularnar av frálíkum trøum, greinar av pálmatrøum, og bularnar av tjúkkum trøum, og pílatrø úr ánni; og tit skulu fegnast frammi fyri HARRANUM Guði tykkara sjey dagar.

41 Og tit skulu halda tað eina hátíð at HARRANUM sjey dagar í árinum. *Tað skal vera* ein áseting um ævir í ættum tykkara: tit skulu feira tað í tí sjeynda mánaðinum.

42 Tit skulu búgva í búðum *í* sjey dagar; allir, sum eru Ísraelitar føddir, skulu búgva í búðum:

43 At tykkara ættir mega vita, at eg fekk Ísraels børn at búgva í búðum, tá ið eg førdi teir út úr Egyptalandi: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

44 Og Móses kunngjørdi børnum Ísraels hátíðir HARRANS.

KAPITUL 24

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Bjóða børnum Ísraels, at teir beri tær reina olivinolju sligna til ljósið, til *tess* at elva lampunum at brenna framhaldandi.

3 Uttanfyri vitnisburðar-forhangið, í samkomu-tabernaklinum, skal Aaron hagreiða tað frá kvøldinum at morgninum frammi fyri HARRANUM áframhaldandi: *tað skal vera* ein áseting um ævir í ættarliðum tykkara.

4 Hann skal hagreiða lampurnar uppiá tí skíra ljósastakanum frammi fyri HARRANUM áframhaldandi.

5 ¶ Og tú skalt taka fínt mjøl, og baka tólv køkur úr tí: tveir tiggjunddeilir skulu vera í ēinari køku.

6 Og tú skalt seta tær í tvær røðir, seks í eini rød, uppá tað skíra borðið frammi fyri HARRANUM.

7 Og tú skalt seta skírt royk-
ilsi uppá *hvørja* rød, at tað má
vera á breyðinum til eitt minni,
enntá eitt offur gjørt viðˆ eldi at
HARRANUM.
8 Hvønn sabbat skal hann
seta tað til rættis frammi fyri
HARRANUM áframhaldandi, *verð-
andi tikið* frá børnum Ísraels viðˆ
einum ævigtvarandi sáttmála.
9 Og tað skal vera Aarons og
sona hansara; og teir skulu eta
tað í tí heilaga plássinum: tí at
tað *er* honum mest heilagt av
HARRANS ofrum gjørdum viðˆ
eldi viðˆ eini viðvarandi áseting.
10 ¶ Og sonurin at eini Ísraelit-
iskari kvinnu, hvørs faðir *var* ein
Egypti, fór út millum Ísraels
barna: og hesin sonurin at hini
Ísraelitisku *kvinnuni* og ein mað-
ur av Ísrael klandraðust saman í
leirinum;
11 Og sonurin at hini Ísraelit-
isku kvinnuni Guðsspottaði navn
HARRANS, og bannaði. Og teir
førdu hann at Mósesi: (og navn
móður hansara *var* Sjé-lō´-mīth,
dóttir Dīb´-rī-s, av ættargrein
Dáns:)
12 Og teir settu hann í varðhald,
at HARRANS hugur mátti verða
sýndur teimum.
13 Og HARRIN talaði við Móses,
sigandi,
14 Før fram hann, sum hevur
bannað, útum leirin; og lat allar,
sum hoyrdu *hann,* leggja hendur
sínar uppá høvur hansara, og lat
alla samkomuna steina hann.
15 Og tú skalt tala við børn
Ísraels, sigandi, Hvørsumhelst *ið*
bannar Guð sín, skal bera synd
sína.
16 Og hann, sum Guðsspottar
navn HARRANS, hann skal viss-
uligani verða tikin av lívi, *og* øll
samkoman skal vissuligani steina
hann: eins væl hin fremmandi,
sum hann sum er føddur í land-
inum, tá ið hann Guðsspottar
navn *HARRANS,* skal hann verða
tikin av lívi.
17 ¶ Og hann, sum drepur
nakran mann, skal vissuligani
verða tikin av lívi.
18 Og hann, sum drepur eitt
djór, skal gera gott *fyri* tað; djór
fyri djór.
19 Og um ein maður elvi eitt
lýti í næsta sín; eins og hann hev-
ur gjørt, soleiðis skal tað verða
gjørt við hann;
20 Brot fyri brot, eyga fyri eyga,
tonn fyri tonn: eins og hann
hevur elvt eitt lýti í ein mann,
soleiðis skal tað verða gjørt við
hann *aftur.*
21 Og hann sum drepur eitt
djór, hann skal endurbøta tað:
og hann sum drepur ein mann,
hann skal verða tikin av lívi.
22 Tit skulu hava ēitt lógar-
háttarlag, eins væl fyri hin fremm-
anda, sum fyri ēin av tykkara
egna landi: tí at eg *eri* HARRIN
Guð tykkara.
23 ¶ Og Móses talaði til Ísra-
els barna, at teir skuldu føra
fram hann, sum hevði bannað, út
úr leirinum, og steina hann við
steinum. Og Ísraels børn gjørdu
sum HARRIN skipaði Mósesi.

KAPITUL 25

OG HARRIN talaði við Móses
á Sí´-naī fjalli, sigandi,
2 Tala við børn Ísraels, og sig við
teir, Tá ið tit koma inn í landið
sum eg gevi tykkum, tá skal land-
ið halda ein sabbat at HARRANUM.
3 Seks ár skalt tú sáa akur tín,
og seks ár skalt tú snidra víngarð
tín, og savna inn ávøkstin harav;
4 Men í tí sjeynda árinum skal
vera ein hvíldar-sabbatur hjá land-
inum, ein sabbatur fyri HARRAN:
tú skalt hvørki sáa akur tín, ella
snidra víngarð tín.
5 Tað, sum veksur av sínum
egnu eintingum av heysti tínum,
skalt tú ikki skera, eiheldur savna

víndrúvurnar av víntræi tínum órøktum: *tí at* tað er eitt hvíldarár hjá landinum.

6 Og landsins sabbatur skal vera matur hjá tykkum; hjá tær, og hjá tænara tínum, og hjá ternu tíni, og hjá tínum leigaða tænara, og hjá tínum fremmanda sum útisitur hjá tær,

7 Og hjá fenaði tínum, og hjá djórunum sum *eru* í landi tínum, skal øll grøðin harav vera matur.

8 ¶ Og tú skal upptelja tær sjey sabbatar av árum, sjey ferðir sjey ár, og skeiðið á teimum sjey sabbatunum av árum skal vera tær fjøruti og níggju ár.

9 Tá skalt tú elva jū-bī-læ´-ūm-slúðrinum at ljóða á tí tíggjunda *deginum* av tí sjeynda mánaðinum, á sáttargerðar-deginum skulu tit fáa lúðurin *at* ljóða út gjøgnum alt land tykkara.

10 Og tit skulu halga tað fimtiunda árið, og kunngera frælsi út gjøgnum *alt* landið yvirfyri øllum íbúgvum tess: tað skal vera tykkum eitt jū-bī-læ´-ūm; og tit skulu venda aftur hvør maður at ogn síni, og tit skulu venda aftur hvør maður at familju síni.

11 Eitt jū-bī-læ´-ūm skal tað fimtiunda árið vera tykkum: tit skulu ikki sáa, ella skera tað sum veksur av sær sjálvum í tí, ella savna *víndrúvurnar* í tí av víntræi tínum órøktum.

12 Tí at tað *er* jū-bī-læ´-ūm-ið, tað skal vera tykkum heilagt: tit skulu eta gróðurin harav uttan av akrinum.

13 Í árinum av hesum jū-bī-læ´-ūm-inum skulu tit venda aftur hvør maður at ogn síni.

14 Og um tú selji okkurt at næsta tínum, ella keypirt *okkurt* av hond næsta tíns, tit skulu ikki kúga hvør annan:

15 Samsvarandi við talið av árum eftir jū-bī-læ´-ūm-ið skalt tú keypa av næsta tínum, *og* sambært talinum av árum av ávøkstunum skal hann selja tær:

16 Samsvarandi við fjøldleikan av árum skalt tú økja um prísin hará, og samsvarandi við fáleikan av árum skalt tú minka um prísin á tí: tí at *samsvarandi* við talið *av árunum* av ávøkstunum selur hann tær.

17 Tit skulu ikki, tessvegna, kúga hvør annan; men tú skalt óttast Guð tín: tí at eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

18 ¶ Hvørsvegna tit skulu gera mínar ásetingar, og halda mínar dómar, og gera tey; og tit skulu búgva í landinum í tryggleika.

19 Og landið skal veita hennara grøði, og tit skulu eta tykkara mettu, og búgva hará í tryggleika.

20 Og um tit skulu siga, Hvat skulu vit eta tað sjeynda árið? sí, vit skulu ikki sáa, ella savna inn vára grøði:

21 Tá vil eg ábjóða mína signing omanyvir tykkum í tí sætta árinum, og tað skal bera fram grøði til trý ár.

22 Og tit skulu sáa tað áttanda árið, og eta *enn* av gamlari grøði inntil tað níggjunda árið; inntil hennara grøðir komi inn, skulu tit eta *av* tí gomlu *goymsluni*.

23 ¶ Landið skal ei verða selt um ævir: tí at landið *er* mítt; tí at tit *eru* fremmandir og útisetar hjá mær.

24 Og í øllum landi ognar tykkara skulu tit veita eina endurloysing fyri landið.

25 ¶ Um tín bróðir veri vaksin fátækur, og hevur selt burtur *nakað* av ogn síni, og um nakar av hansara næstringum komi at endurloysa tað, tá skal hann endurloysa tað sum bróðir hansara seldi.

26 Og um maðurin havi ongan at endurloysa tað, og sjálvur veri førur fyri at endurloysa tað;

27 Tá lat hann telja árini av

søluni hará, og endurbøta manninum yvirskotið, til hvørs hann seldi tað; at hann má venda aftur at ogn síni.

28 Men um hann veri ikki fúrur fyri at endurbøta *tað* til hansara, tá skal tað, sum er selt, verða verandi í hondini á honum sum hevur keypt tað, inntil jú-bí-læ´-úm-s-árið: og í jú-bí-læ´-úm-inum skal tað fara út, og hann skal venda aftur at ogn síni.

29 Og um ein maður selji eitt bústaðar hús í einum múraðum staði, tá kann hann endurloysa tað innanfyri eitt heilt ár eftir *at* tað er selt; *innanfyri* eitt samfult ár kann hann endurloysa tað.

30 Og um tað verði ikki endurloyst innanfyri skeiðið á einum samfullum ári, tá skal húsið, sum *er* í tí múraða staðinum, verða grundfest um ævir til hansara sum keypti tað, út gjøgnum ættir hansara: tað skal ikki fara út í jú-bí-læ´-úm-inum.

31 Men húsini av teimum bygdunum sum hava ongan múr rundan um tær, skulu verða roknaði sum akrar *bónda*landsins: tey mega verða endurloyst, og tey skulu fara út í jú-bí-læ´-úm-inum.

32 Hóast hetta, staðirnar hjá Levitunum, *og* húsini av staðunum av ogn síni, mega Levitarnir endurloysa til einahvørja tíð.

33 Og um ein maður keypi av Levitunum, tá skal húsið sum selt varð, og staðurin av ogn hansara, fara út í jú-bí-læ´-úm-s-*árinum:* tí at húsini av staðunum hjá Levitunum *eru* teirra ogn millum Ísraels barna.

34 Men akurin av útjaðarunum av teirra staðum má ei verða seldur; tí at hann *er* teirra viðvarandi ogn.

35 ¶ Og um bróðir tín veri *seg* vaksin fátækur, og fallin í forfall hjá tær; tá skalt tú lætta um *hjá* honum: *ja, hóast hann veri* ein fremmandur, ella ein útiseti; at hann má liva hjá tær.

36 Tak tú onga fæleigu av honum, ella vøksturs*gjald:* men óttast Guð tín; at bróðir tín má liva hjá tær.

37 Tú skalt ikki geva honum pening tín uppá fæleigu, ella læna honum vistir tínar fyri vøksturs*gjald*.

38 Eg *eri* HARRIN Guð tykkara, sum førdi tykkum fram út úr Egyptalandi, til at geva tykkum land Cānaans, *og* til at vera Guð tykkara.

39 ¶ Og um bróðir tín, *sum býr* hjá tær, veri vaksin fátækur, og verði seldur at tær; tú skalt ikki noyða hann at tæna sum ein trælatænari:

40 *Men* sum ein leigaður tænari, *og* sum ein útiseti, skal hann vera hjá tær, *og* skal tæna tær at jú-bí-læ´-úm-s-árinum:

41 Og *tá* skal hann fara avstað frá tær, *bæði* hann og børn hansara við honum, og skal venda aftur at egnu familju síni, og at ognini hjá fedrum sínum skal hann venda aftur.

42 Tí at teir *eru* tænarar mínir, sum eg førdi fram út úr Egyptalandi: teir skulu ikki verða seldir sum trælmenn.

43 Tú skalt ikki ráða yvir honum við harðrendni; men skalt óttast Guð tín.

44 Bæði trælmenn tínir, og tínar trælmoyggjar, sum tú skalt hava, *skulu vera* av hinum heidnu sum eru rundan um tykkum; av teimum skulu tit keypa trælmenn og trælmoyggjar.

45 Haraftrat av børnunum hjá hinum fremmandu sum útisita tykkara millum, av teimum skulu tit keypa, og av teirra familjum sum *eru* hjá tykkum, sum tey gótu í landi tykkara: og tey skulu vera ogn tykkara.

46 Og tit skulu taka tey sum ein

arv til tykkara børn eftir tykkum, at arva *tey til* eina ogn; teir skulu vera tykkara trælmenn um ævir: men yvir tykkara brøðrum, børnum Ísraels, skulu tit ikki ráða ēin yvir øðrum við harðrendni.

47 ¶ Og um ein útiseti ella fremmandur vaksi ríkur hjá tær, og tín bróðir, *sum býr beint* við hann, vaksi fátækur, og selji seg sjálvan at hinum fremmanda *ella* útisetanum *beint* við teg, ella til stammuna av familjuni hjá tí fremmanda:

48 Eftir at hann er seldur, kann hann verða endurloystur aftur; ēin av hansara brøðrum kann endurloysa hann:

49 Ella foreldrabróðir hansara, ella sonur foreldrabróðurs hansara, kann endurloysa hann, ella *onkur* sum er nær í ætt við hann av familju hansara, kann endurloysa hann; ella um hann veri *seg* førur, kann hann endurloysa seg sjálvan.

50 Og hann skal rokna *saman* við honum sum keypti hann, frá tí árinum sum hann varð seldur til hansara, *fram* at jū-bī-læ´-ŭm-s-árinum: og virðið á hansara sølu skal vera samsvarandi við talið av árum, samsvarandi við tíðina hjá einum leigaðum tænara skal tað vera við honum.

51 Um *tað veri* enn mong ár *eftir,* sambært teimum skal hann geva aftur virðið á síni endurloysing burturav peninginum sum hann varð keyptur fyri.

52 Og um tað veri eftir bert fá ár *fram* at jū-bī-læ´-ŭm-s-árinum, tá skal hann telja við honum, *og* sambært árum sínum skal hann geva honum aftur virðið á endurloysing síni.

53 *Og* sum ein árligur leigaður tænari skal hann vera hjá honum: *og hīn* skal ikki ráða við harðrendni yvir honum í eygsjón tíni.

54 Og um hann verði ikki endurloystur í hesum *árunum,* tá skal hann fara út í jū-bī-læ´-ŭm-s-árinum, *bæði* hann, og børn hansara við honum.

55 Tí at yvirfyri mær *eru* børn Ísraels tænarar; teir *eru* mínir tænarar, sum eg førdi fram út úr Egyptalandi: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

KAPITUL 26

TIT skulu gera tykkum ongar skurðgudar ella rista mynd, eiheldur reisa tykkum upp eina standandi mynd, eiheldur skulu tit seta upp *nakra* mynd úr steini í landi tykkara, til at boyggjast niður at henni: tí at eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

2 ¶ Tit skulu halda mínar sabbatar, og virðingaróttast mín halgidóm: eg *eri* HARRIN.

3 ¶ Um tit gangi í mínum ásetingum, og haldi boðini hjá mær, og geri tey;

4 Tá vil eg geva tykkum regn í tøkum tíma, og landið skal veita grøði sína, og trø akursins skulu lata ávøkst sín.

5 Og tykkara tresking skal røkka at vínskurðinum, og vínskurðurin skal røkka at sáðingartíðini: og tit skulu eta tykkara breyð til hins fulnar, og dvøljast í landi tykkara tryggliga.

6 Og eg vil geva frið í landinum, og tit skulu leggjast niður, og eingin skal gera *tykkum* rædd ar: og eg vil úrskilja ónd djór út úr landinum, eiheldur skal svørðið fara ígjøgnum land tykkara.

7 Og tit skulu elta tykkara figgindar, og teir skulu falla frammi fyri tykkum við^ svørðinum.

8 Og fimm av tykkum skulu elta hundrað, og hundrað av tykkum skulu senda tíggju túsund á flótta: og tykkara figgindar skulu falla frammi fyri tykkum við^ svørðinum.

9 Tí at eg vil hava fyrilit yvirfyri

tykkum, og gera tykkum fruktagóðar, og margfalda tykkum, og grunda mín sáttmála við tykkum.
10 Og tit skulu eta gamla goymslu, og bera út tað gamla uppá grund av tí nýggja.
11 Og eg vil seta mítt tabernakkul tykkara millum: og míni sál skal ikki standast við tykkum.
12 Og eg vil ganga tykkara millum, og vil vera Guð tykkara, og tit skulu vera fólk mítt.
13 Eg *eri* HARRIN Guð tykkara, sum førdi tykkum fram út úr Egyptalandi, at tit skuldu ikki vera trælmenn teirra; og eg havi brotið bondini av oki tykkara, og fingið tykkum *at* ganga upprættar.
14 ¶ Men um tit vilji ikki geva gætur at mær, og vilji ikki gera øll hesi boð;
15 Og um tit skulu vanvirða mínar ásetingar, ella um tykkara sál standist við mínar dómar, so at tit vilji ikki gera øll míni boð, *men* at tit bróti mín sáttmála:
16 Eg vil eisini gera hetta at tykkum; eg vil enntá skipa yvir tykkum ræðslu, upptæring, og hina brennandi kaldsótt, sum skal upptæra eyguni, og volda hjartasorg: og tit skulu sáa tykkara sáð til einkiðs, tí at tykkara fíggindar skulu eta tað.
17 Og eg vil seta mítt andlit ímóti tykkum, og tit skulu verða vignir frammi fyri tykkara fíggindum: teir, sum hata tykkum, skulu ríkja yvir tykkum; og tit skulu flýggja tá ið eingin eltir tykkum.
18 Og um tit vilji ikki enn fyri alt hetta geva gætur at mær, tá vil eg revsa tykkum sjey ferðir meira fyri tykkara syndir.
19 Og eg vil bróta hugmóðina av tykkara kraft; og eg vil gera tykkara himin sum jarn, og tykkara jørð sum messing:
20 Og tykkara styrki skal verða brúkt til einkiðs: tí at tykkara land skal ikki veita gróði sína, eiheldur skulu landsins trø veita ávøkstir sínar.
21 ¶ Og um tit gangi andstøðis mær, og vilji ikki geva gætur at mær; vil eg føra sjey ferðir meiri plágur uppá tykkum samsvarandi við tykkara syndir.
22 Eg vil eisini senda vill djór tykkara millum, sum skulu ræna tykkum fyri børn tykkara, og oyða tykkara fenað, og gera tykkum fáar í tali; og tykkara *høvuðs*vegir skulu verða oydnir.
23 Og um tit vilji ikki verða bøttir um av mær við^ hesum tingunum, men vilji ganga andstøðis mær;
24 Tá vil eg eisini ganga andstøðis tykkum, og vil revsa tykkum enn sjey ferðir fyri tykkara syndir.
25 Og eg vil føra eitt svørð uppá tykkum, sum skal endurgjalda trætu sáttmála *míns:* og tá ið tit eru savnaðir saman fyri innan staðir tykkara, vil eg senda drepsóttina tykkara millum; og tit skulu verða flýggjaðir inn í hondina á fíggindanum.
26 *Og* tá ið eg havi brotið stavin av breyði tykkara, skulu tíggju kvinnur baka tykkara breyð í ēinum ovni, og tær skulu lata *tykkum* tykkara breyð aftur eftir vekt: og tit skulu eta, og ikki verða mettaðir.
27 Og um tit vilji ikki fyri alt hetta geva gætur at mær, men ganga andstøðis mær;
28 Tá vil eg ganga andstøðis tykkum eisini í øði; og eg, enntá eg, vil aga tykkum sjey ferðir fyri tykkara syndir.
29 Og tit skulu eta kjøtið á sonum tykkara, og kjøtið á døtrum tykkara skulu tit eta.
30 Og eg vil oyðileggja tykkara høgu pláss, og skera niður tykkara myndir, og kasta tykkara ræ^

uppá ræini av tykkara skurðgudum, og míni sál skal standast við tykkum.

31 Og eg vil gera tykkara staðir oydnar, og føra tykkara halgidómar til oyðingar, og eg vil ikki lukta angan av tykkara søtu angilsum.

32 Og eg vil føra landið inn í oyðing: og tykkara fíggindar, sum búgva harí, skulu vera ovfarnir yvir tað.

33 Og eg vil spjaða tykkum millum hinna heidnu, og vil draga út eitt svørð eftir tykkum: og tykkara land skal verða oyði, og tykkara staðir oydnir.

34 Tá skal landið njóta hennara sabbatar, so leingi sum tað liggur oyði, og tit *verði* í landi fíggindaˆ tykkara; *enntá* tá skal landið hvíla, og njóta hennara sabbatar.

35 So leingi sum tað liggur oyði, skal tað hvíla; av tí at tað hvíldi ikki í tykkara sabbatum, tá ið tit dvaldust uppiá tí.

36 Og uppá teir, sum eru eftir *livandi* av tykkum, vil eg senda eina ørmekt inn í teirra hjørtu í londunum hjá teirra fíggindum; og ljóðið av einum ristum leyvi skal elta teir; og teir skulu flýggja, sum flýggjandi frá einum svørði; og teir skulu falla tá ið eingin eltir.

37 Og teir skulu falla ēin uppá annan, sum var tað frammi fyri einum svørði, tá ið eingin eltir: og tit skulu ongan mátt hava til at standast frammi fyri tykkara fíggindum.

38 Og tit skulu týnast millum hinna heidnu, og landið hjá tykkara fíggindum skal eta tykkum upp.

39 Og teir, sum eru eftir av tykkum, skulu træna burtur í síni misgerð í londunum hjá tykkara fíggindum; og eisini í misgerðunum hjá sínum fedrum skulu teir træna burtur við teimum.

40 Um teir skulu játta sína misgerð, og misgerðina hjá sínum fedrum, við sínum misbroti sum teir hava misbrotist ímóti mær, og sum eisini teir hava gingið andstøðis mær;

41 Og *sum* eg eisini havi gingið andstøðis teimum, og havi fært teir inn í landið hjá teirra fíggindum; um teirra óumskornu hjørtu tá verði eyðmýkt, og teir tá góðtaki av revsingini av síni misgerð:

42 Tá vil eg minnast mín sáttmála við Jákob, og eisini mín sáttmála við Ísaak, og eisini mín sáttmála við Ábraham vil eg minnast; og eg vil minnast landið.

43 Landið eisini skal verða eftirlatið av teimum, og skal njóta sínar sabbatar, meðan hon liggur oyðin uttan teir: og teir skulu góðtaka av revsingini av síni misgerð: av tí at, enntá av tí at teir vanvirdu mínar dómar, og av tí at teirra sálum stóðst við mínar ásetingar.

44 Og tó fyri alt tað, tá ið teir verði í landi fíggindaˆ sína, eg vil ikki kasta teir burtur, eiheldur vil mær standast við teir, til at oyða teir fullkomiliga, og til at bróta mín sáttmála við teir: tí at eg *eri* HARRIN Guð teirra.

45 Men eg vil fyri teirra sakir minnast sáttmálan hjá teirra forfedrum, hvørjar eg førdi fram út úr Egyptalandi í eygsjónini á teimum heidnu, at eg mátti vera Guð teirra: eg *eri* HARRIN.

46 Hetta *eru* tær ásetingar og dómar og lógir, sum HARRIN gjørdi ímillum seg og børn Ísraels á Sĭ-nāi fjalli viðˆ hendi Móse.

KAPITUL 27

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Tá ið ein maður skal gera eitt ēinstakt heitstreingi, *tá skulu*

persónarnir *vera* fyri HARRANUM eftir tíni meting.

3 Og tín meting skal vera av kallkyninum frá tjúgu ára gomlum enntá at seksti ára gomlum, enntá tín meting skal vera fimti sjē´-kl-ar av silvuri, eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum.

4 Og um tað *veri seg* ein kvennkyns, tá skal tín meting vera tríati sjē´-kl-ar.

5 Og um *tað veri* frá fimm ára gomlum enntá at tjúgu ára gomlum, tá skal tín meting vera av kallkyninum tjúgu sjē´-kl-ar, og fyri kvennkynið tíggju sjē´-kl-ar.

6 Og um *tað veri* frá einum mánaða gomlum enntá at fimm ára gomlum, tá skal tín meting vera av kallkyninum fimm sjē´-kl-ar av silvuri, og fyri kvennkynið *skal* tín meting *vera* tríggir sjē´-kl-ar av silvuri.

7 Og um *tað veri* frá seksti ára gomlum og omanfyri; um *tað veri* ein kallkyns, tá skal tín meting vera fimtan sjē´-kl-ar, og fyri kvennkynið tíggju sjē´-kl-ar.

8 Men um hann veri fátækari enn tín metan, tá skal hann framseta seg sjálvan framfyri prestin, og presturin skal meta virðið á honum; samsvarandi við førleika hansara, sum strongdi, skal presturin meta virðið á honum.

9 Og um *tað veri* eitt djór, hvarav menn koma við einum ofri at HARRANUM, alt sum *nakar maður* gevur av slíkum at HARRANUM skal vera heilagt.

10 Hann skal ikki skifta tí, ella broyta tað, eitt gott fyri eitt ringt, ella eitt ringt fyri eitt gott: og um hann yvirhøvur skal broyta djór fyri djór, so skal tað og umbýtið av tí vera heilagt.

11 Og um *tað veri* nakað óreint djór, av hvørjum teir ikki ofra eitt sláturoffur at HARRANUM, tá skal hann framseta djórið framfyri prestin:

12 Og presturin skal meta virðið á tí, hvørt tað veri *seg* gott ella ringt: eins og tú metirt virðið á tí, *sum ert* presturin, soleiðis skal tað vera.

13 Men um hann yvirhøvur vilji endurloysa tað, tá skal hann leggja ein fimta*part* harav afturat tíni meting.

14 ¶ Og tá ið ein maður skal halga sítt hús *til at vera* HARRANUM heilagt, tá skal presturin meta *um* tað, hvørt tað veri *seg* gott ella ringt: eins og presturin skal meta *um* tað, soleiðis skal tað standa.

15 Og um hann, sum halgar tað, vilji endurloysa hús sítt, tá skal hann leggja fimta*part*in av peninginum av tíni meting aftrat tí, og tað skal vera hansara.

16 Og um ein maður skal halga HARRANUM *onkran part* av einum akri av ogn síni, tá skal tín meting vera samsvarandi við sáðið av tí: ein hō´-mēr av byggsáði *skal verða mett í virði* á fimti sjē´-kl-ar av silvuri.

17 Um hann halgi sín akur frá jū-bī-læ´-ūm-s-árinum, samsvarandi við tína meting skal hann standa.

18 Men um hann halgi sín akur eftir jū-bī-læ´-ūm-ið, tá skal presturin rokna honum peningin samsvarandi við árini sum eru eftir, alt at jū-bī-læ´-ūm-s-árinum, og tað skal verða lækkað frá tíni meting.

19 Og um hann, sum halgaði akurin, vilji á nakran vís endurloysa hann, tá skal hann leggja fimta*part*in av peninginum av tíni meting aftrat tí, og hann skal vera tryggjaður til hansara.

20 Og um hann vilji ikki endurloysa akurin, ella um hann havi selt akurin til ein annan mann, skal hann ei verða endurloystur meira.

21 Men akurin, tá ið hann gongur út í jū-bī-læ´-ūm-inum, skal vera heilagur at HARRANUM, sum ein akur tilvígdur; ognin av honum skal vera prestsins.

22 Og um *ein maður* halgi at HARRANUM ein akur sum hann hevur keypt, sum *er* ikki av akrunum av ogn hansara;

23 So skal presturin rokna honum virðið á tíni meting, *enntá* at jū-bī-lǣ´-ŭm-s-árinum: og hann skal geva tína meting á tí degi, *sum* ein heilagan lut at HARRANUM.

24 Í jū-bī-lǣ´-ŭm-s-árinum skal akurin venda aftur at honum, av hvørjum hann varð keyptur, *enntá* til hansara, til hvørs ognin av landinum *hoyrdi*.

25 Og allar tínar metingar skulu vera samsvarandi við sjē´-kŭl-in hjá halgidóminum: tjúgu gē´-râh-ir skal vera sjē´-kŭl-in.

26 ¶ Einans frumburðurin av djórunum, sum skuldi vera frumburður HARRANS, eingin maður skal halga hann; hvørt *hann veri seg* oksi, ella seyður: hann *er* HARRANS.

27 Og um *tað veri* av einum óreinum djóri, so skal hann endurloysa *tað* samsvarandi við tína meting, og skal leggja ein fimta*part* av tí aftrat tí: ella um tað veri ikki endurloyst, so skal tað verða selt samsvarandi við tína meting.

28 Hóast hetta, eingin tilvígdur lutur, sum ein maður skal tilvíga HARRANUM av øllum sum hann hevur, *bæði* av manni og djóri, og av akrinum av síni ogn, skal verða seldur ella endurloystur: hvør tilvígdur lutur *er* HARRANUM mest heilagur.

29 Eingin tilvígdur, sum skal verða tilvígdur av monnum, skal verða endurloystur; *men* skal vissuligani verða tikin av lívi.

30 Og øll tíggjund landsins, *hvørt* av sáði landsins, *ella* av ávøksti træsins, *er* HARRANS: *tað er* HARRANUM heilagt.

31 Og um ein maður vilji yvirhøvur endurloysa *okkurt* av sínum tíggjundum, *so* skal hann leggja aftrat hartil fimta*part*in av tí.

32 Og viðvíkjandi tíggjundini av stórfæafylginum, ella av smáfæafylginum, *enntá* av hvørjumsumhelst *ið* fer undir stavin, tíggjundin skal vera HARRANUM heilag.

33 Hann skal ikki kanna hvørt tað veri *seg* gott ella ringt, eiheldur skal hann broyta tað: og um hann broyti tað yvirhøvur, so skal bæði tað og tað broytta av tí vera heilagt; tað skal ikki verða endurloyst.

34 Hesi *eru* boðini sum HARRIN skipaði Mósesi fyri børn Ísraels á Sī´-nâi fjalli.

HIN FJÓRÐA BÓK MÓSESAR, KALLAÐ NUMMUR.

KAPITUL 1

OG HARRIN talaði við Móses í Sī´-nâi-s oyðu, í samkomutabernaklinum, á hinum fyrsta *degi* av øðrum mánaðinum, í øðrum árinum eftir at teir vóru komnir út úr Egyptalandi, sigandi,

2 Takið tit samløguna av allari samkomu Ísraels barna, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, við talinum á *teirra* nøvnum, hvør hannur eftir skallum teirra;

3 Frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum eru førir fyri at fara út til kríggj í Ísrael: tú og Aaron skulu upptelja teir útfrá herum teirra.

4 Og hjá tykkum skal tað vera ein maður av hvørji ættargrein; hvør *og* ein høvd av húsi fedra sína.

5 ¶ Og hesi *eru* nøvnini hjá monnunum sum skulu standa hjá tykkum: av *ættargrein* Reubens; Elízur Sjedeurs sonur.

6 Av Símeoni; Sjelúmiel Zúrísjaddaís sonur.

7 Av Judah; Náhsjon Ammínádabs sonur.

8 Av Ísakhar; Nethánel Zúars sonur.

9 Av Zebúlon; Elíab Helónsonur.

10 Av børnum Josephs: av Ephraím; Elísjámá Ammíhúds sonur: av Manasse; Gamáliel Pedahzúrs sonur.

11 Av Benjamin; Abídan Gídeónís sonur.

12 Av Dáni; Ahíesér Ammísjaddaís sonur.

13 Av Ásjer; Págiel Ókransonur.

14 Av Gádi; Elíasaph Deuélsonur.

15 Av Naphtalí; Áhíra Enansonur.

16 Hesir *vóru* teir navnfromu av samkomuni, prinsar av ættargreinum fedra sína, høvdini av túsundum í Ísrael.

17 ¶ Og Móses og Aaron tóku hesar menninar, sum eru tilskilaðir eftir nøvnum *sínum:*

18 Og teir stevndu allari samkomuni saman á hinum fyrsta *degi* hins annars mánaðar, og teir kunngjørdu sínar avstammingar eftir familjum sínum, útfrá húsinum hjá sínum fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, eftir skallum sínum.

19 Eins og HARRIN skipaði Mósesi, soleiðis upptaldi hann teir í Sínaís oyðu.

20 Og børn Reubens, elsta sonar Ísraels, eftir ættum teirra, útfrá teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, útfrá teirra skallum, hvør hannur frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;

21 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av ættargrein Reubens, *vóru* fjøruti og seks túsund og fimm hundrað.

22 ¶ Av Símeons børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, teir sum vórðu upptaldir av teimum, samsvarandi við talið á nøvnunum, útfrá teirra skallum, hvør hannur frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;

23 Teir, sum vórðu taldir av teimum, *enntá* av Símeons ættargrein, *vóru* fimti og níggju túsund og trý hundrað.

24 ¶ Av Gáds børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;

25 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Gáds ættargrein, *vóru* fjøruti og fimm túsund seks hundrað og fimti.

26 ¶ Av Judah børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;

27 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Judah ættargrein, *vóru* trísinstjúgu og fjúrtan túsund og seks hundrað.

28 ¶ Av Ísakhars børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum

og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;
29 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Ĭs´-să-châr-s ættargrein, *vóru* fimti og fýra túsund og fýra hundrað.
30 ¶ Av Zē´-bŭ-lŏn-s børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;
31 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Zē´-bŭ-lŏn-s ættargrein, *vóru* fimti og sjey túsund og fýra hundrað.
32 ¶ Av Jóseph-s børnum, *nevniliga,* av Ē´-phră-ĭm-s børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;
33 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Ē´-phră-ĭm-s ættargrein, *vóru* fjøruti túsund og fimm hundrað.
34 ¶ Av Mă-năs´-sĕh børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;
35 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Mă-năs´-sĕh ættargrein, *vóru* tríati og tvey túsund og tvey hundrað.
36 ¶ Av Benjamins børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;
37 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Benjamins ættargrein, *vóru* tríati og fimm túsund og fýra hundrað.
38 ¶ Av Dáns børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;
39 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Dáns ættargrein, *vóru* trísinstjúgu og tvey túsund og sjey hundrað.
40 ¶ Av Ásjers børnum, útfrá teirra ættum, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;
41 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Ásjers ættargrein, *vóru* fjøruti og ēitt túsund og fimm hundrað.
42 ¶ Av Năph´-tâ-lī-s børnum, út gjøgnum teirra ættir, eftir teirra familjum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, samsvarandi við talið á nøvnunum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj;
43 Teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *enntá* av Năph´-tâ-lī-s ættargrein, *vóru* fimti og trý túsund og fýra hundrað.
44 Hesir *eru* teir sum vórðu upptaldir, sum Móses og Aaron upptaldu, og prinsarnir av Ísrael, *verandi* tólv menn: hvør *og* ēin var fyri hús fedra sína.
45 Soleiðis vóru allir teir sum vórðu upptaldir av Ísraels børnum, útfrá húsinum hjá teirra fedrum, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, allir sum vóru førir fyri at fara út til kríggj í Ísrael;
46 Enntá allir teir sum vórðu upptaldir, vóru seks hundrað túsund og trý túsund og fimm hundrað og fimti.
47 ¶ Men Levitarnir eftir ættargrein fedra sína vórðu ikki upptaldir teirra millum.

48 Tí at HARRIN hevði talað við Móses, sigandi,
49 Einans tú skalt ikki upptelja Levīs ættargrein, eiheldur taka samløguna av teimum millum Ísraels barna:
50 Men tú skalt útnevna Levitarnar yvir vitnisburðar-tabernaklinum, og yvir øllum reiðunum harav, og yvir øllum lutum sum *hoyra* til tess: teir skulu bera tabernaklið, og øll reiðini harhjá; og teir skulu tæna at tí, og skulu leirast runt um tabernaklið.
51 Og tá ið tabernaklið setur frameftir, skulu Levitarnir taka tað niður: og tá ið tabernaklið eigur at verða sligið upp, skulu Levitarnir seta tað upp: og hin fremmandi, sum kemur í nánd, skal verða tikin av lívi.
52 Og Ísraels børn skulu sláa upp síni tjøld, hvør maður við sín egna leir, og hvør maður við sín egna fána, út gjøgnum herlið síni.
53 Men Levitarnir skulu sláa upp runt um vitnisburðar-tabernaklið, at tað verði eingin vreiði uppiá samkomu Ísraels barna: og Levitarnir skulu halda álegging vitnisburðar-tabernakkulsins.
54 Og Ísraels børn gjørdu samsvarandi við alt sum HARRIN bjóðaði Mósesi, soleiðis gjørdu teir.

KAPITUL 2

OG HARRIN talaði við Móses og við Aaron, sigandi,
2 Hvør maður av Ísraels børnum skal sláa upp hjá sínum egna fána, við eyðkennið hjá húsi faðirs teirra: langt burturí kring samkomu-tabernaklið skulu teir sláa upp.
3 Og á eystur síðuni ímóti sólarrisinum skulu teir av fánanum hjá leirinum hjá Judah sláa upp út gjøgnum herar sínar: og Náh'sjón Am-mín'-ă-dăb-s sonur *skal vera* høvuðsmaður Judah barna.
4 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* trísinstjúgu og fjúrtan túsund og seks hundrað.
5 Og teir, sum sláa upp næst at honum, *skulu vera* ættargrein Ĭs'-să-chăr-s: og Nĕth-á'-nēĕl Zū'-ăr-s sonur *skal vera* høvuðsmaður Ĭs'-să-chăr-s barna.
6 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir harav, *vóru* fimti og fýra túsund og fýra hundrað.
7 *Síðan* Zē'-bŭ-lŏn-s ættargrein: og Ē'-lī-ăb Hē'-lŏn-s sonur *skal vera* høvuðsmaður Zē'-bŭ-lŏn-s barna.
8 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir harav, *vóru* fimti og sjey túsund og fýra hundrað.
9 Allir, sum vórðu upptaldir í leiri Judah, *vóru* eitt hundrað túsund og fýrsinstjúgu túsund og seks túsund og fýra hundrað, út gjøgnum teirra herar. Hesir skulu fyrst leggja avstað.
10 ¶ Á suður síðuni *skal vera* fánin hjá leirinum hjá Rēūbeni samsvarandi við herar teirra: og høvuðsmaður Rēūbens barna *skal vera* Ē'-lī-zūr Sjē'-dê-ūr-s sonur.
11 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir harav, *vóru* fjøruti og seks túsund og fimm hundrað.
12 Og teir, sum sláa upp hjá" honum, *skulu vera* Símeons ættargrein: og høvuðsmaður Símeons barna *skal vera* Sjĕ-lū'-mī-ĕl Zū-rī-sjăd'-dâi-s sonur.
13 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* fimti og níggju túsund og trý hundrað.
14 Síðan Gáds ættargrein: og høvuðsmaðurin hjá Gáds sonum *skal vera* Ē'-lī-ă-săph Rēū'-ĕl-s sonur.
15 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* fjøruti og fimm túsund og seks hundrað og fimti.

16 Allir, sum vórðu upptaldir í leirinum hjá Reûbeni, *vóru* eitt hundrað túsund og fimti og ēitt túsund og fýra hundrað og fimti, út gjøgnum herar teirra. Og teir skulu leggja út í øðrum riðilinum.

17 ¶ Síðan skal samkomutabernaklið leggja avstað við leirinum hjá Levitunum í miðjum leirinum: eins og teir leirast, soleiðis skulu teir leggja avstað, hvør maður í sínum plássi hjá merkjum teirra.

18 ¶ Á vestur síðuni *skal vera* fánin hjá leirinum hjá Ē´-phră-ĭm samsvarandi við herar teirra: og høvuðsmaðurin hjá sonum Ē´-phră-ĭm-s *skal vera* Ē-lī-sjá´-mă Ăm´-mĭ-hŭd-s sonur.

19 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* fjøruti túsund og fimm hundrað.

20 Og hjá″ honum *skal vera* Mă-năs´-sĕh ættargrein: og høvuðsmaðurin hjá Mă-năs´-sĕh børnum *skal vera* Gă-mă´-lĭ-ĕl Pĕ-dâh´-zūr-s sonur.

21 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* tríati og tvey túsund og tvey hundrað.

22 Síðan Benjamins ættargrein: og høvuðsmaðurin hjá Benjamins sonum *skal vera* Ă´-bī-dăn Gī-dê-ō´-nī-s sonur.

23 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* tríati og fimm túsund og fýra hundrað.

24 Allir, sum vórðu upptaldir av leirinum hjá Ē´-phră-ĭm, *vóru* eitt hundrað túsund og átta túsund og eitt hundrað, út gjøgnum teirra herar. Og teir skulu fara frameftir í triðja riðilinum.

25 ¶ Fánin hjá Dáns leiri *skal vera* á norður síðuni við herarnar hjá teimum: og høvuðsmaðurin hjá Dáns børnum *skal vera* Ă-hī-ē´-zĕr Ăm-mĭ-sjăd´-dâi-s sonur.

26 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* trísinstjúgu og tvey túsund og sjey hundrað.

27 Og teir, sum leirast hjá″ honum, *skulu vera* ættargrein Ásjers: og høvuðsmaðurin hjá børnum Ásjers *skal vera* Pá´-gĭ-ĕl Ō´-crăn-s sonur.

28 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* fjøruti og ēitt túsund og fimm hundrað.

29 ¶ Síðan Năph´-tâ-lī-s ættargrein: og høvuðsmaðurin hjá Năph´-tâ-lī-s børnum *skal vera* Á´-hĭ-ră Ē´-năn-s sonur.

30 Og herliðið hjá honum, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* fimti og trý túsund og fýra hundrað.

31 Allir teir, sum vórðu upptaldir í Dáns leiri, *vóru* eitt hundrað túsund og fimti og sjey túsund og seks hundrað. Teir skulu fara aftastir við fánum sínum.

32 ¶ Hesir *eru* teir sum vórðu upptaldir av børnum Ísraels eftir húsinum hjá fedrum teirra: allir teir, sum vórðu upptaldir av leirunum út gjøgnum herar teirra, *vóru* seks hundrað túsund og trý túsund og fimm hundrað og fimti.

33 Men Levitarnir vórðu ikki upptaldir millum Ísraels barna; eins og HARRIN bjóðaði Mósesi.

34 Og Ísraels børn gjørdu samsvarandi við alt sum HARRIN bjóðaði Mósesi: soleiðis uppslógu teir hjá″ fánum sínum, og soleiðis løgdu teir avstað, hvør *og* ēin eftir teirra familjum, samsvarandi við húsið hjá teirra fedrum.

KAPITUL 3

HETTA eisini *eru* ættirnar hjá Aaroni og Mósesi, á tí degi *sum* HARRIN talaði við Móses á Sĭ´-năi fjalli.

2 Og hesi *eru* nøvnini hjá sonum Aarons; Nádab hin frumborni, og Ā´-bĭ-hû, Ĕl-ĕ-ā´-zâr, og Ĭth´-ă-mâr.
3 Hesi *eru* nøvnini hjá sonum Aarons, prestunum sum vóru salvaðir, hvørjar hann innvígaði til at tæna í prests-embætinum.
4 Og Nádab og Ā´-bĭ-hû doyðu frammi fyri HARRANUM, tá ið teir ofraðu fremmandan eld frammi fyri HARRANUM, í Sĭ´-nâĭ-s oyðu, og teir høvdu eingi børn: og Ĕl-ĕ-ā´-zâr og Ĭth´-ă-mâr tæntu í prests-embætinum í eygsjón Aarons, faðirs síns.
5 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
6 Før ættargrein Levīs nær, og framset teir framfyri Aaron prest, at teir mega tæna at honum.
7 Og teir skulu halda álegging hansara, og áleggingina hjá allari samkomuni frammanfyri samkomu-tabernaklið, til at gera tænastu tabernakkulsins.
8 Og teir skulu varða um øll amboð samkomu-tabernakkulsins, og álegging Ísraels barna, til at gera tænastu tabernakkulsins.
9 Og tú skalt geva Levitarnar at Aaroni og til sona hans: teir *eru* heil*veg*is givnir honum burtur úr børnum Ísraels.
10 Og tú skalt útnevna Aaron og synir hansara, og teir skulu varta um prests-embæti sítt: og hin fremmandi, sum kemur í nánd, skal verða tikin av lívi.
11 Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
12 Og eg, sí, eg havi tikið Levitarnar burturúr børnum Ísraels ístaðin fyri alt tað frumborna sum opnar móðurlívið millum Ísraels barna: Levitarnir tí skulu vera mínir;
13 Av tí at allir teir frumbornu *eru* mínir; *tí at* á tí degi sum eg sló allar teir frumbornu í Egyptalandi, halgaði eg mær allar teir frumbornu í Ísrael, bæði mann og djór: mínir skulu teir vera: eg *eri* HARRIN.
14 ¶ Og HARRIN talaði við Móses í Sĭ´-nâĭ-s oyðu, sigandi,
15 Upptel Levīs børn eftir húsi fedra teirra, útfrá teirra familjum: hvønn kallkyns frá einum mánaða gomlum og uppeftir skalt tú upptelja teir.
16 Og Móses upptaldi teir samsvarandi við orð HARRANS, eins og honum var boðið.
17 Og hesir vóru synir Levīs eftir nøvnum teirra; Gĕr´-sjŏn, og Kō´-hăth, og Mĕ-râr´-ī.
18 Og hesi *eru* nøvnini hjá sonum Gĕr´-sjŏn-s eftir familjum teirra; Lĭb´-nī, og Sjĭm´-ĕ-ī.
19 Og synirnir hjá Kō´-hăth útfrá teirra familjum; Amram, og Ĭ´-zĕ-hâr, Hĕ´-brŏn, og Ŭz´-zī-ĕl.
20 Og synirnir hjá Mĕ-râr´-ī útfrá teirra familjum; Mâh´-lī, og Mŭ´-sjī. Hetta *eru* familjurnar hjá Levitunum samsvarandi við húsið hjá teirra fedrum.
21 Av Gĕr´-sjŏn-i *var* familjan hjá Lĭb-nĭt´-unum, og familjan hjá Sjĭm-ĭt´-unum: hetta *eru* familjurnar hjá Gĕr-sjŏn-ĭt´-unum.
22 Teir sum vórðu upptaldir av teimum, samsvarandi við talið á øllum køllunum, frá einum mánaða gomlum og uppeftir, *enntá* teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* sjey túsund og fimm hundrað.
23 Familjurnar hjá Gĕr-sjŏn-ĭt´-unum skulu sláa upp aftanfyri tabernaklið vestureftir.
24 Og hin fremsti av húsi faðirs Gĕr-sjŏn-ĭt´-anna *skal vera* Ē´-lĭ-ă-săph Lá´-ĕl-s sonur.
25 Og áleggingin hjá sonum Gĕr´-sjŏn-s í samkomu-tabernaklinum *skal vera* tabernaklið, og tjaldið, dekking tess, og tjaldváðin til dyrnar á samkomu-tabernaklinum,
26 Og tjaldváðirnar av forgarðinum, og tjalddúkurin til dyrnar

av forgarðinum, sum *er* við tabernaklið, og við altarið runt íkring, og bondini hjá tí til alla tænastuna hjá tí.

27 ¶ Og av Kō´hăth *var* familjan hjá Amramitunum, og familjan hjá Ĭzê-hâr-ĭt´-unum, og familjan hjá Hê-brŏn-ĭt´-unum, og familjan hjá Ŭz-zī-ĕ-lĭt´-unum: hetta *eru* familjurnar hjá Kō-hăth-ĭt´-unum.

28 Í talinum hjá øllum køllunum, frá einum mánaða gomlum og uppeftir, *vóru* átta túsund og seks hundrað, haldandi álegging halgidómsins.

29 Familjurnar av sonum Kō´hăth-s skulu sláa upp við síðuna av tabernaklinum suðureftir.

30 Og hin fremsti av húsinum hjá faðirinum av familjunum hjá Kō-hăth-ĭt´-unum *skal vera* Ĕ-lĭ´-zăphăn Ŭz´-zī-ĕl-s sonur.

31 Og teirra álegging *skal vera* ørkin, og borðið, og ljósastakin, og altarini, og reiðini hjá halgidóminum, hvarvið teir tæna, og tjaldváðin, og øll tænastan harav.

32 Og Ĕl-ĕ-ā´-zâr, sonur Aarons prests, *skal vera* fremstur yvir hinum fremstu av Levitunum, *og hava* umsjónina av teimum sum halda álegging halgidómsins.

33 ¶ Av Mĕ-râr´-ī *var* familjan hjá Măh-lĭt´-unum, og familjan hjá Mû-sjĭt´-unum: hetta *eru* familjurnar av Mĕ-râr´-ī.

34 Og teir sum vórðu upptaldir av teimum, samsvarandi við talið á øllum køllunum, frá einum mánaða gomlum og uppeftir, *vóru* seks túsund og tvey hundrað.

35 Og hin fremsti av húsinum hjá faðirinum av familjum Mĕ-râr´-ī-s *var* Zū´-rī-ĕl Á´-bī-hāĭl-s sonur: *hesir* skulu sláa upp við síðuna av tabernaklinum norðureftir.

36 Og *undir* umsjónini og áleggingini hjá sonum Mĕ-râr´-ī-s *skulu vera tilju*borðini av tabernaklinum, og tvørtrøini hjá tí, og stólparnir hjá tí, og soklarnir hjá tí, og øll reiðini hjá tí, og alt sum tænir hartil,

37 Og stólparnir av forgarðinum runt um, og teirra soklar, og teirra hælir, og teirra bond.

38 ¶ Men teir sum leirast frammanfyri tabernaklið ímóti eystan, *enntá* frammanfyri samkomu-tabernaklið eystureftir, *skulu vera* Móses, og Aaron og synir hansara, haldandi álegging halgidómsins fyri álegging Ísraels barna; og hin fremmandi, sum kemur í nánd, skal verða tikin av lívi.

39 Allir sum vórðu upptaldir av Levitunum, sum Móses og Aaron upptaldu við ábjóðing HARRANS, út gjøgnum teirra familjur, allir kallarnir frá einum mánaða gomlum og uppeftir, *vóru* tjúgu og tvey túsund.

40 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Upptel allar teir frumbornu av hannum Ísraels barna frá einum mánaða gomlum og uppeftir, og tak talið á teirra nøvnum.

41 Og tú skalt taka Levitarnar til mín, (eg *eri* HARRIN), ístaðin fyri allar teir frumbornu millum Ísraels barna; og fenaðin hjá Levitunum ístaðin fyri tað frumborna millum fenað Ísraels barna.

42 Og Móses upptaldi, eins og HARRIN bjóðaði honum, allar teir frumbornu millum Ísraels barna.

43 Og allir teir frumbornu hannarnir eftir talinum á nøvnum, frá einum mánaða gomlum og uppeftir, av teimum sum vórðu upptaldir av teimum, vóru tjúgu og tvey túsund tvey hundrað og trísinstjúgu og trettan.

44 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

45 Tak Levitarnar ístaðin fyri allar teir frumbornu millum Ísraels barna, og fenaðin hjá Levitunum ístaðin fyri teirra fenað; og Levitarnir skulu vera mínir: eg *eri* HARRIN.

46 Og fyri teir sum eiga at verða endurloystir av teimum tvey hundrað og trísinstjúgu og trettan av teimum frumbornu av Ísraels børnum, sum eru fleiri enn Levitarnir;

47 Tú skalt enntá taka fimm sjē´-kl-ar stykkið eftir skallanum, eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum skalt tú taka *teir:* (sjē´-kŭl-in *er* tjúgu gē´-râh-ir:)

48 Og tú skalt geva peningin, við hvørjum avlops talið av teimum eiga at verða endurloystir, at Aaroni og til sona hansara.

49 Og Móses tók endurloysingar peningin av teimum sum vóru yvir og uppum teir sum vórðu endurloystir av Levitunum:

50 Av teimum frumbornu av Ísraels børnum tók hann peningin; eitt túsund trý hundrað og trísinstjúgu og fimm *sjē´-kl-ar,* eftir sjē´-kl-i halgidómsins:

51 Og Móses gav peningin av teimum sum vórðu endurloystir at Aaroni og til sona hans, samsvarandi við orð HARRANS, eins og HARRIN skipaði Mósesi.

KAPITUL 4

OG HARRIN talaði við Móses og við Aaron, sigandi,

2 Tak samløguna av sonum Kō´-hăth-s burturúr sonum Levīs, eftir familjum teirra, útfrá húsinum hjá fedrum teirra,

3 Frá tríati ára gomlum og uppeftir enntá inntil fimti ára gamlar, allar sum innfara inn í herin, til at gera arbeiðið í samkomu-tabernaklinum.

4 Hetta *skal vera* tænastan hjá sonum Kō´-hăth-s í samkomutabernaklinum, *kring* hini mest heilagu ting:

5 ¶ Og tá ið leirurin setur frameftir, skal Aaron koma, og hansara synir, og teir skulu taka niður hitt dekkandi forhang, og dekka vitnisburðar-ørkina við tí:

6 Og skulu seta hará dekkingina av grevlingaskinnum, og skulu breiða yvir *hana* eitt áklæði heil*veg*is av bláum, og skulu seta í stavir tess.

7 Og uppá sýnisbreyðs-borðið skulu teir breiða eitt áklæði av bláum, og seta hará føtini, og sleivirnar, og skálirnar, og skeinkireiðir til at skeinkja við: og hitt áframhaldandi breyðið skal vera hará:

8 Og teir skulu breiða uppá tey eitt áklæði av skarlaks*reyðum,* og dekka tað sama við eini dekking av grevlingaskinnum, og skulu seta í stavir tess.

9 Og teir skulu taka eitt áklæði av bláum, og dekka ljósastaka ljóssins, og hansara lampur, og hansara *veik*tengur, og hansara skarpannur, og øll oljukørini harav, hvarvið teir tæna at honum:

10 Og teir skulu seta hann og øll reiðini harav innanfyri eina dekking av grevlingaskinnum, og skulu seta *hann* uppá eitt tvørtræ.

11 Og uppá hitt gylta altarið skulu teir breiða eitt áklæði av bláum, og dekka tað við eini dekking av grevlingaskinnum, og skulu seta til stavirnar hjá tí:

12 Og teir skulu taka øll tænastu amboðini, við hvørjum teir tæna í halgidóminum, og koyra *tey* í eitt klæði av bláum, og dekka tey við eini dekking av grevlingaskinnum, og skulu koyra *tey* á eina stong:

13 Og teir skulu taka burtur øskurnar frá altarinum, og breiða eitt purpur áklæði hará:

14 Og teir skulu seta uppá tað øll reiðini harav, við hvørjum teir tæna um tað, *enntá* roykilsis-pannurnar, kjøtkrókarnar, og skuplurnar, og kørini, øll reiðini hjá altarinum; og teir skulu breiða uppá tað eina dekking av grevlingaskinnum, og seta til stavirnar hjá tí.

15 Og tá ið Aaron og hansara synir hava gjørt *seg* lidnar við at dekka halgidómin, og øll reiðini hjá halgidóminum, sum leirurin eigur at leggja avstað; eftir tað skulu synirnir hjá Kŏ′-hăth koma at bera *tað:* men teir skulu ikki nema við *nakran* heilagan lut, at ikki teir doyggi. Hesi *tingini eru* byrðan hjá sonum Kŏ′-hăth-s í samkomu-tabernaklinum.

16 ¶ Og til embætis Ĕl-ĕ-ā′-zâr-s, sonar Aarons prests, *tilhøyrir* oljan til ljósið, og tað søta roykilsið, og tað dagliga matofrið, og salvingaroljan, *og* umsjónin av øllum tabernaklinum, og av øllum sum harí *er,* í halgidóminum, og í reiðunum harav.

17 ¶ Og HARRIN talaði við Móses og við Aaron, sigandi,

18 Skerið tit ikki av ættargreinina av familjunum hjá Kō-hăth-ĭt′-unum burturúr Levitunum:

19 Men soleiðis gerið teimum, at teir mega liva, og ikki doyggja, tá ið teir nærkast at teimum mest heilagu tingunum: Aaron og hansara synir skulu fara inn, og skipa teir hvønn *og* ēin til sína tænastu og til sína byrðu:

20 Men teir skulu ikki fara inn at síggja tá ið tey heilagu tingini verða dekkaði, at ikki teir doyggi.

21 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

22 Tak eisini samløguna av sonum Gĕr′-sjŏn-s, út gjøgnum húsini hjá teirra fedrum, eftir teirra familjum;

23 Frá tríati ára gomlum og uppeftir inntil fimti ára gamlar skalt tú upptelja teir; allar sum innfara inn at útføra tænastuna, til at gera arbeiðið í samkomu-tabernaklinum.

24 Hetta *er* tænastan hjá familjunum hjá Gĕr-sjŏn-ĭt′-unum, til at tæna, og til byrður:

25 Og teir skulu bera tjalddúkar tabernakkulsins, og samkomu-tabernaklið, dekking hans, og dekkingina av grevlingaskinnunum sum *er* uppiyvir uppiá tí, og tjaldváðina til dyrnar á samkomu-tabernaklinum,

26 Og tjaldváðirnar av forgarðinum, og tjaldváðina til dyrnar á forgarðs-portrinum, sum er hjá″ tabernaklinum og hjá″ altarinum runt umkring, og teirra bond, og øll amboðini av teirra tænastu, og alt sum er gjørt til teirra: soleiðis skulu teir tæna.

27 Við tilskilan Aarons og sona hansara skal vera øll tænastan hjá sonum Gĕr-sjŏn-ĭt′-anna, í øllum teirra byrðum, og í allari teirra tænastu: og tit skulu tilskila teimum í álegging allar teirra byrður.

28 Hetta *er* tænastan hjá familjunum av sonum Gĕr′-sjŏn-s í samkomu-tabernaklinum: og teirra álegging *skal vera* undir hendi Ĭth′-ă-mâr-s, sonar Aarons prests.

29 ¶ Hvat sonum Mĕ-râr′-ĭ-s viðvíkur, tú skalt upptelja teir eftir familjum teirra, útfrá húsinum hjá fedrum teirra;

30 Frá tríati ára gomlum og uppeftir enntá at fimti ára gomlum skalt tú upptelja teir, hvønn tann sum innfer inn í tænastuna, til at gera verk samkomu-tabernakkulsins.

31 Og hetta *er* áleggingin av teirra byrðu, samsvarandi við alla teirra tænastu í samkomu-tabernaklinum; *tilju*borðini av tabernaklinum, og tvørtrøini hjá tí, og stólparnir hjá tí, og soklarnir hjá tí,

32 Og stólparnir av forgarðinum runt umkring, og teirra soklar, og teirra hælir, og teirra bond, við øllum teirra amboðum, og við allari teirra tænastu: og eftir navni skulu tit rokna amboðini av áleggingini av teirra byrðu.

33 Hetta *er* tænastan hjá familjunum av sonum Mĕ-râr′-ĭ-s, samsvarandi við alla teirra tænastu, í

samkomu-tabernaklinum, undir hendi Ith´-ă-mâr-s, sonar Aarons prests.

34 ¶ Og Móses og Aaron og teir fremstu av samkomuni upptaldu synirnar hjá Kō-hăth-ĭt´-unum eftir familjum teirra, og eftir húsinum hjá teirra fedrum,

35 Frá tríati ára gomlum og uppeftir enntá at fimti ára gomlum, hvønn tann sum innfer inn í tænastuna, til verkið í samkomu-tabernaklinum:

36 Og teir sum vórðu upptaldir av teimum, eftir familjum teirra, vóru tvey túsund sjey hundrað og fimti.

37 Hesir *vóru* teir sum vórðu upptaldir av familjunum hjá Kō-hăth-ĭt´-unum, allir ið máttu gjørt tænastu í samkomu-tabernaklinum, sum Móses og Aaron upptaldu samsvarandi við ábjóðing HARRANS við^ hendi Móse.

38 Og teir sum vórðu upptaldir av sonum Gĕr´-sjŏn-s, út gjøgnum teirra familjur, og útfrá húsinum hjá teirra fedrum,

39 Frá tríati ára gomlum og uppeftir enntá at fimti ára gomlum, hvør tann sum innfer inn í tænastuna, til verk samkomu-tabernakkulsins,

40 Enntá teir sum vórðu upptaldir av teimum, út gjøgnum teirra familjur, eftir húsinum hjá teirra fedrum, vóru tvey túsund og seks hundrað og tríati.

41 Hesir *eru* teir sum vórðu upptaldir av familjunum hjá sonum Gĕr´-sjŏn-s, av øllum sum máttu gjørt tænastu í samkomu-tabernaklinum, hvørjar Móses og Aaron upptaldu samsvarandi við ábjóðing HARRANS.

42 ¶ Og teir sum vórðu upptaldir av familjunum hjá sonum Mĕ-râr´-ī-s, út gjøgnum teirra familjur, útfrá húsinum hjá teirra fedrum,

43 Frá tríati ára gomlum og uppeftir enntá at fimti ára gomlum, hvør tann sum innfer inn í tænastuna, til verk samkomu-tabernakkulsins,

44 Enntá teir sum vórðu upptaldir av teimum eftir teirra familjum, vóru trý túsund og tvey hundrað.

45 Hesir *veri* teir sum vórðu upptaldir av familjunum hjá sonum Mĕ-râr´-ī-s, hvørjar Móses og Aaron upptaldu samsvarandi við HARRANS orð við^ hendi Móse.

46 Allir teir sum vórðu upptaldir av Levitunum, hvørjar Móses og Aaron og teir fremstu av Ísrael upptaldu, eftir familjum teirra, og eftir húsinum hjá teirra fedrum,

47 Frá tríati ára gomlum og uppeftir enntá at fimti ára gomlum, hvør tann ið kom at gera tænastu tæningarinnar, og tænastu byrðunnar í samkomu-tabernaklinum,

48 Enntá teir sum vórðu upptaldir av teimum, vóru átta túsund og fimm hundrað og fýrsinstjúgu.

49 Samsvarandi við ábjóðing HARRANS vórðu teir upptaldir við^ hendi Mósesar, hvør *og* ēin samsvarandi við hansara tænastu, og samsvarandi við hansara byrðu: svá vórðu teir upptaldir av honum, eins og HARRIN skipaði Mósesi.

KAPITUL 5

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Bjóða børnum Ísraels, at teir koyri út úr leirinum hvønn spitalskan, og hvønn tann sum hevur eitt útflot, og hvønnsumhelst *ið* er dálkaður av teimum deyðu:

3 Bæði kallkyns og kvennkyns skulu tit koyra út, útum leirin skulu tit koyra tey; at tey dálki ei sínar leirar, í miðjum hvørjum eg dvøljist.

4 Og Ísraels børn so gjørdu, og

koyrdu tey út útum leirin: eins og HARRIN talaði við Móses, soleiðis gjørdu børn Ísraels.

5 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

6 Tala við børn Ísraels, Tá ið ein maður ella kvinna skal fremja nakra synd sum menn fremja, til at gera eitt misbrot ímóti HARRANUM, og tann persónurin veri *seg* sekur;

7 Tá skulu tey játta sína synd sum tey hava gjørt: og hann skal endurgjalda sítt misbrot við tí hægsta av tí, og leggja aftrat tí fimta*part*in av tí, og geva *tað* at *honum,* ímóti hvørjum hann hevur brotist.

8 Men um maðurin havi ongan næstring at endurgjalda misbrotið at, lat misbrotið verða endurgoldið at HARRANUM, *enntá* til prestin; umframt sáttargerðarveðrin, við hvørjum ein sáttargerð skal verða gjørd fyri hann.

9 Og hvørt offur av øllum hinum heilagu tingum Ísraels barna, sum teir koma við at prestinum, skal vera hansara.

10 Og hvørs mans halgaðu ting skulu vera hansara: hvatsumhelst *ið* nakar maður gevur prestinum, tað skal vera hansara.

11 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

12 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Um kona nakars mans fari til viks, og fremji eitt misbrot ímóti honum,

13 Og ein maður liggi við henni kjøtliga, og tað verði fjalt frá eygunum á manni hennara, og verði hildið loynt, og hon verði dálkað, og *tað veri* einkið vitni ímóti henni, eiheldur hon verði tikin *við háttarlaginum;*

14 Og ástbrelnis-andin komi uppá hann, og hann veri *seg* ástbrellin um sína konu, og hon veri *seg* dálkað: ella um ástbrelnisandin komi uppá hann, og hann veri øvundsjúkur um sína konu, og hon veri *seg* ikki dálkað:

15 Tá skal maðurin koma við konu síni at prestinum, og hann skal koma við hennara ofri fyri hana, tíggjundar*part*in av eini ḗ-phūh av byggmjøli; hann skal onga olju hella uppá tað, ella koyra roykilsi hará; tí at tað *er* eitt ástbrelnisoffur, eitt minnisoffur, førandi misgerð til minnis.

16 Og presturin skal koma við henni nær, og seta hana framfyri HARRAN:

17 Og presturin skal taka heilagt vatn í eitt jarðílat; og av støvinum sum er í gólvinum av tabernaklinum skal presturin taka, og koyra *tað* inn í vatnið:

18 Og presturin skal seta kvinnuna framfyri HARRAN, og avdekka høvur kvinnunnar, og koyra minnisofrið í hennara hendur, sum *er* ástbrelnisofrið: og presturin skal hava í síni hond tað beiska vatnið sum veldur banningina:

19 Og presturin skal áleggja henni við einum eiði, og siga við kvinnuna, Um eingin maður havi ligið við tær, og um tú hevurt ikki farið til viks til óreinsku *við einum øðrum* ístaðin fyri mann tín, veri tú frí frá hesum beiska vatninum sum veldur banningina:

20 Men um tú hevurt farið til viks *til ein annan* ístaðin fyri mann tín, og um tú veri *teg* dálkað, og onkur maður havi ligið við tær umframt maður tín:

21 Tá skal presturin áleggja kvinnuni við einum banningareiði, og presturin skal siga við kvinnuna, HARRIN geri teg *til* eina banning og ein eið millum fólks tíns, tá ið HARRIN fær tína lend at rotna, og kvið tín at trútna;

22 Og hetta vatnið, sum veldur banningina, skal fara inn í tínar innangoymslur, at fáa *tín* kvið at trútna, og *tína* lend at rotna: og kvinnan skal siga, Ā́-měn, ấ-měn.

23 Og presturin skal skriva hesar banningarnar í eina bók, og hann skal sletta *tær* út við tí beiska vatninum:
24 Og hann skal elva kvinnuni at drekka tað beiska vatnið sum veldur banningina: og vatnið, sum veldur banningina, skal innfara inn í hana, *og gerast* beiskt.
25 So skal presturin taka ástbrelnisofrið út úr kvinnunnar hond, og skal reiggja ofrinum frammi fyri HARRANUM, og ofra tað uppiá altarinum:
26 Og presturin skal taka ein fullan lógva av ofrinum, *enntá* minnið harav, og brenna *tað* uppiá altarinum, og síðani skal elva kvinnuni at drekka vatnið.
27 Og tá ið hann hevur fingið hana at drekka vatnið, tá skal tað bera á, *at* um hon veri *seg* dálkað, og havi gjørt misbrot ímóti manni sínum, at vatnið sum veldur banningina skal innfara inn í hana, *og gerast* beiskt, og hennara kviður skal trútna, og hennara lend skal rotna: og kvinnan skal vera ein banning millum fólks síns.
28 Og um kvinnan veri *seg* ikki dálkað, men veri *seg* rein; tá skal hon vera frí, og skal ala fram sáð.
29 Hetta *er* lógin um ástbrelnir, tá ið ein kona fer til viks *til ein annan* ístaðin fyri mann sín, og verður dálkað;
30 Ella tá ið ástbrelnis-andin kemur uppá hann, og hann verði ástbrellin yvir sína konu, og skal seta kvinnuna framfyri HARRAN, og presturin skal útinna uppá hana alla hesa lóg.
31 Tá skal maðurin vera sakleysur frá misgerð, og henda kvinna skal bera sína misgerð.

KAPITUL 6

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,
2 Tala við børn Ísraels, og sig við tey, Tá ið annaðhvørt maður ella kvinna skulu atskilja *seg sjálv* til at streingja eitt heiti hjá einum Nazariti, til at atskilja *seg sjálv* at HARRANUM:
3 Hann skal atskilja *seg sjálvan* frá víni og sterkum drykki, og skal drekka ongan edik av víni, ella edik av sterkum drykki, eiheldur skal hann drekka nakra pressuvætu av víndrúvum, ella eta ráligar víndrúvur, ella turkaðar.
4 Allar dagarnar av sínum atskilnaði skal hann eta einkið sum er gjørt av víntræinum, frá kjarnunum enntá til skalið.
5 Allar dagarnar av heitinum av hans atskilnaði skal tað eingin rakiknívur koma uppá hans høvur: inntil dagarnir verði uppfyltir, í hvørjum hann atskildi *seg sjálvan* at HARRANUM, hann skal vera heilagur, *og* skal lata lokkarnar av hárinum av sínum høvdi vaksa.
6 Allar dagarnar, sum hann atskildi *seg sjálvan* at HARRANUM, skal hann koma at ongum deyðum kroppi.
7 Hann skal ikki gera seg sjálvan óreinan fyri faðir sín, ella fyri móður sína, fyri bróður sín, ella fyri systur sína, tá ið tey doyggja: av tí at innvíging Guðs hans *er* uppiá høvdi hans.
8 Allar dagarnar av sínum atskilnaði *er* hann heilagur at HARRANUM.
9 Og um nakar maður doyggi sera brádligani hjá" honum, og hann hevur dálkað høvdið av síni innvíging; tá skal hann raka sítt høvur á deginum av síni reinsan, á tí sjeynda deginum skal hann raka tað.
10 Og á tí áttanda deginum skal hann koma við tveimum turtildúgvum, ella tveimum ungum dúgvum, til prestin, til dyrnar á samkomu-tabernaklinum:
11 Og presturin skal ofra ta ēinu til eitt syndoffur, og hīna til eitt brennioffur, og gera eina

sáttargerð fyri hann, fyri at hann syndaði viðˇ hinum deyða, og skal halga sítt høvur hin sama dagin.

12 Og hann skal innvíga HARRANUM dagarnar av sínum atskilnaði, og skal koma við einum fyrsta árs lambi til eitt misbrotsoffur: men dagarnir, sum vóru frammanundan, skulu vera mistir, av tí at atskilnaður hansara varð dálkaður.

13 ¶ Og hetta *er* lógin um Nazaritan, tá ið dagarnir av hans atskilnaði eru uppfyltir: hann skal verða førdur at dyrnum á samkomu-tabernaklinum:

14 Og hann skal ofra sítt offur at HARRANUM, ēitt fyrsta árs veðurlamb uttan lýti til eitt brennioffur, og ēitt fyrsta árs gimburlamb uttan lýti til eitt syndoffur, og ēin veður uttan lýti til friðoffurˇ,

15 Og eina tægu av ósúrgaðum breyði, køkur av fínum mjøli blandaðar við olju, og flatkøkur av ósúrgaðum breyði salvaðar við olju, og teirra matoffur, og drykkofrini av teimum.

16 Og presturin skal koma við *teimum* framfyri HARRAN, og skal ofra sítt syndoffur, og sítt brennioffur:

17 Og hann skal ofra veðrin *til* eitt friðofraˇ-sláturoffur at HARRANUM, við tæguni av ósúrgaðum breyði: presturin skal ofra eisini sítt matoffur, og sítt drykkoffur.

18 Og Nazaritin skal raka høvdið av sínum atskilnaði *við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum, og skal taka hárið av sínum høvdi av sínum atskilnaði, og koyra *tað* í eldin sum *er* undir friðofraˇ-sláturofrinum.

19 Og presturin skal taka tann sjóðaða bógvin av veðrinum, og ēina ósúrgaða køku úr tæguni, og ēina ósúrgaða flatkøku, og skal seta *tey* uppá hendurnar hjá Nazaritinum, eftir *at hárið av* hans atskilnaði er rakað:

20 Og presturin skal reiggja teimum *til* eitt reiggioffur frammi fyri HARRANUM: hetta *er* heilagt hjá prestinum, við reiggibringuni og hevjibóvnum: og eftir tað kann Nazaritin drekka vín.

21 Hetta *er* lógin um Nazaritan sum strongt hevur *heiti, og um* hans offur at HARRANUM fyri sín atskilnað, umframt *tað* sum hans hond skal útvega: samsvarandi við heitstreingið sum hann heitti, soleiðis má hann gera eftir lógini um sín atskilnað.

22 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

23 Tala við Aaron og við synir hansara, sigandi, Á hesa vís skulu tit vælsigna børn Ísraels, sigandi við teir,

24 HARRIN signi teg, og varði teg:

25 HARRIN fái sítt andlit *at* skína uppá teg, og veri tær náðisamur:

26 HARRIN lyfti upp sína ásjón uppá teg, og gevi tær frið.

27 Og teir skulu seta mítt navn uppá børn Ísraels; og eg vil vælsigna teir.

KAPITUL 7

OG tað hendi á tí deginum ið Móses hevði full*veg*is sett upp tabernaklið, og hevði salvað tað, og halgað tað, og øll amboðini hjá tí, bæði altarið og øll reiðini hjá tí, og hevði salvað tey, og halgað tey;

2 At Ísraels prinsar, høvuðs*menn* av húsinum hjá teirra fedrum, sum *vóru* prinsarnir hjá ættargreinunum, og vóru yvir teimum sum vóru upptaldir, ofraðu:

3 Og teir komu við sínum ofri framfyri HARRAN, seks dekkaðum vagnum, og tólv oksum; einum vagni fyri tveir av prinsunum, og fyri hvønn *og* ēin einum oksa: og teir komu við teimum framfyri tabernaklið.

4 Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
5 Tak *tað* av teimum, at teir mega vera til at gera tænastuna hjá samkomu-tabernaklinum; og tú skalt geva Levitunum teir, til hvønn mann samsvarandi við hansara tænastu.
6 Og Móses tók vagnarnar og oksarnar, og gav Levitunum teir.
7 Tveir vagnar og fýra oksar gav hann sonum Gĕr´-sjŏn-s, samsvarandi við teirra tænastu:
8 Og fýra vagnar og átta oksar gav hann sonum Mĕ-râr´-ī-s, samsvarandi við teirra tænastu, undir hendi Ĭth´-ă-mâr-s, sonar Aarons prests.
9 Men sonum Kō´-hăth-s gav hann ongan: av tí at tænasta halgidómsins, tilhoyrandi teimum, *var tað* teir skuldu bera uppiá sínum herðum.
10 ¶ Og prinsarnir ofraðu til innvíging av altarinum á tí degi sum tað varð salvað, enntá prinsarnir ofraðu sítt offur frammanfyri altarið.
11 Og HARRIN segði við Móses, Teir skulu ofra sítt offur, hvør prinsur á sínum degi, til vígslu av altarinum.
12 ¶ Og hann, sum ofraði sítt offur hin fyrsta dagin, var Náh´-sjŏn Ăm-mĭn´-ă-dăb-s sonur, av Judah ættargrein:
13 Og hansara offur *var* ēitt silvur fat, vektin á tí *var* eitt hundrað og tríati *sjē´-kl-ar,* ēin silvur bolli á tjúgu sjē´-kl-ar, eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum *vóru* full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
14 Ēin sleiv á tíggju *sjē´-kl-ar* av gulli, full av roykilsi:
15 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
16 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
17 Og til eitt friðofra˘-slátur-offur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Náh´-sjŏn Ăm-mĭn´-ă-dăb-s syni.
18 ¶ Á øðrum deginum ofraði Nĕth-á´-nēel Zū´-âr-s sonur, prinsur hjá Ĭs´-să-chăr:
19 Hann ofraði *til* sítt offur ēitt silvur fat, vektin á hvørjum *var* eitt hundrað og tríati *sjē´-kl-ar,* ēin silvur bolla á sjeyti sjē´-kl-ar, eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
20 Ēina sleiv av gulli á tíggju *sjē´-kl-ar,* full av roykilsi:
21 Ēin ungan ungtarv, ēin veðr, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
22 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
23 Og til eitt friðofra˘-slátur-offur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Nĕth-á´-nēel Zū´-âr-s syni.
24 ¶ Á tí triðja deginum *ofraði* Ē´-lī-ăb Hē´-lŏn-s sonur, prinsur hjá Zē´-bŭ-lŏn-s børnum:
25 Hansara offur *var* ēitt silvur fat, vektin á hvørjum *var* eitt hundrað og tríati *sjē´-kl-ar,* ēin silvur bolli á sjeyti sjē´-kl-ar, eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
26 Ēin gull sleiv á tíggju *sjē´-kl-ar,* full av roykilsi:
27 Ēin ungur ungtarvur, ein veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
28 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
29 Og til eitt friðofra˘-slátur-offur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Ē´-lī-ăb Hē´-lŏn-s syni.

30 ¶ Á tí fjórða deginum *ofraði* Ē-lī-zūr Sjē-dê-ūr-s sonur, prinsur hjá Reûbens børnum:
31 Hansara offur *var* ēitt silvur fat á eitt hundrað og tríati *sjē-kl-a* vekt, ēin silvur bolli á sjeyti sjē-kl-ar, eftir sjē-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
32 Ēin gull sleiv á tíggju *sjē-kl-ar,* full av roykilsi:
33 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
34 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
35 Og til eitt friðofraŭ-slátur-offur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Ē-lī-zūr Sjē-dê-ūr-s syni.
36 ¶ Á tí fimta deginum *ofraði* Sjě-lū-mī-ěl Zū-rī-sjăd-dâi-s sonur, prinsur hjá Símeons børnum:
37 Hansara offur *var* ēitt silvur fat, vektin á hvørjum *var* eitt hundrað og tríati *sjē-kl-ar,* ēin silvur bolli á sjeyti sjē-kl-ar, eftir sjē-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
38 Ēin gull sleiv á tíggju *sjē-kl-ar,* full av roykilsi:
39 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
40 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
41 Og til eitt friðofraŭ-slátur-offur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Sjě-lū-mī-ěl-i Zū-rī-sjăd-dâi-s syni.
42 ¶ Á tí sætta deginum *ofraði* Ē-lī-ă-săph Deu-ěl-s sonur, prinsur hjá Gáds børnum:
43 Hansara offur *var* ēitt silvur fat á eitt hundrað og tríati *sjē-kl-a* vekt, ein silvur bolli á sjeyti sjē-kl-ar, eftir sjē-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
44 Ēin gull sleiv á tíggju *sjē-kl-ar,* full av roykilsi:
45 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
46 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
47 Og til eitt friðofraŭ-slátur-offur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Ē-lī-ă-săph Deu-ěl-s syni.
48 ¶ Á tí sjeynda deginum *ofraði* Ē-lī-sjá-mă Ăm-mī-hūd-s sonur, prinsur hjá Ē-phră-īm-s børnum:
49 Hansara offur *var* ēitt silvur fat, vektin á hvørjum *var* eitt hundrað og tríati *sjē-kl-ar,* ēin silvur bolli á sjeyti sjē-kl-ar, eftir sjē-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
50 Ēin gull sleiv á tíggju *sjē-kl-ar,* full av roykilsi:
51 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
52 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
53 Og til eitt friðofraŭ-slátur-offur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Ē-lī-sjá-mă Ăm-mī-hūd-s syni.
54 ¶ Á tí áttanda deginum *ofraði* Gă-mă-lī-ěl Pě-dâh-zūr-s sonur, prinsur hjá Mă-năs-sēh børnum:
55 Hansara offur *var* ēitt silvur fat á eitt hundrað og tríati *sjē-kl-a* vekt, ēin silvur bolli á sjeyti sjē-kl-ar, eftir sjē-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
56 Ēin gull sleiv á tíggju *sjē-kl-ar,* full av roykilsi:

57 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
58 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
59 Og til eitt friðofraŭ-sláturoffur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Gă-mā́lī-ĕl-i Pĕ-dâh́-zūr-s syni.
60 ¶ Á tí níggjunda deginum *ofraði* Ā́-bī-dăn Gī-dê-ŏ́-nī-s sonur, prinsur hjá Benjamins børnum:
61 Hansara offur *var* ēitt silvur fat, vektin á hvørjum *var* eitt hundrað og tríati *sjḗkl-ar,* ēin silvur bolli á sjeyti sjḗ-kl-ar, eftir sjḗ-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
62 Ēin gull sleiv á tíggju *sjḗ-klar,* full av roykilsi:
63 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
64 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
65 Og til eitt friðofraŭ-sláturoffur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Ā́-bī-dăn Gī-dê-ŏ́-nī-s syni.
66 ¶ Á tí tíggjunda deginum *ofraði* Ă-hī-ḗ-zĕr Ăm-mī-sjăd́-dâī-s sonur, prinsur hjá Dáns børnum:
67 Hansara offur *var* ēitt silvur fat, vektin á hvørjum *var* eitt hundrað og tríati *sjḗkl-ar,* ēin silvur bolli á sjeyti sjḗ-kl-ar, eftir sjḗ-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
68 Ēin gull sleiv á tíggju *sjḗ-klar,* full av roykilsi:
69 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
70 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
71 Og til eitt friðofraŭ-sláturoffur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Ă-hī-ḗzĕr Ăm-mī-sjăd́-dâī-s syni.
72 ¶ Á tí ellivta deginum *ofraði* Pá́-gī-ĕl Ṓ-crăn-s sonur, prinsur hjá Ásjers børnum:
73 Hansara offur *var* ēitt silvur fat, vektin á hvørjum *var* eitt hundrað og tríati *sjḗkl-ar,* ēin silvur bolli á sjeyti sjḗ-kl-ar, eftir sjḗ-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
74 Ēin gull sleiv á tíggju *sjḗ-klar,* full av roykilsi:
75 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
76 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
77 Og til eitt friðofraŭ-sláturoffur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Pá́-gī-ĕl Ṓ-crăn-s syni.
78 ¶ Á tí tólvta deginum *ofraði* Á́-hī-ră Ḗ-năn-s sonur, prinsur hjá Năph́-tâ-lī-s børnum:
79 Hansara offur *var* ēitt silvur fat, vektin á hvørjum *var* eitt hundrað og tríati *sjḗkl-ar,* ēin silvur bolli á sjeyti sjḗ-kl-ar, eftir sjḗ-kl-inum hjá halgidóminum; bæði av teimum full av fínum mjøli, blandaðum við olju, til eitt matoffur:
80 Ēin gull sleiv á tíggju *sjḗ-klar,* full av roykilsi:
81 Ēin ungur ungtarvur, ēin veðrur, ēitt fyrsta árs lamb, til eitt brennioffur:
82 Ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur:
83 Og til eitt friðofraŭ-sláturoffur, tveir oksar, fimm veðrar, fimm havrar, fimm fyrsta árs lomb: hetta *var* ofrið hjá Á́-hī-ră Ḗ-năn-s syni.

84 Hetta *var* innvígingin av altarinum, á tí degi tá tað varð salvað, frá Ísraels prinsum: tólv føt av silvuri, tólv silvur bollar, tólv sleivir av gulli:

85 Hvørt fat av gulli *vigandi* eitt hundrað og tríati *sjē´-kl-ar,* hvør bolli sjeyti: øll silvur íløtini *vigaðu* tvey túsund og fýra hundrað *sjē´-kl-ar,* eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum:

86 Tær gyltu sleivirnar *vóru* tólv, fullar av roykilsi, *vigandi* tíggju *sjē´-kl-ar* stykkið, eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum: alt gullið av sleivunum *var* eitt hundrað og tjúgu *sjē´-kl-ar.*

87 Allir oksarnir til brenniofrið *vóru* tólv ungtarvar, veðrarnir tólv, fyrsta árs lombini tólv, við teirra matofri: og lombini av geitunum til syndoffur tólv.

88 Og allir oksarnir til friðofraˇsláturofrið *vóru* tjúgu og fýra ungtarvar, veðrarnir seksti, havrarnir seksti, fyrsta árs lombini seksti. Hetta *var* innvígingin av altarinum, eftir at tað var salvað.

89 Og tá ið Móses var farin inn í samkomu-tabernaklið at tala við hann, tá hoyrdi hann røddina á ēinum, talandi við seg oman av náðistólinum, sum *var* uppiá vitnisburðar-ørkini, frá ímillum teir tveir ch̄êr-û-bīm´-arnar: og hann talaði við hann.

KAPITUL 8

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við Aaron, og sig við hann, Tá ið tú kveikirt lampurnar, skulu tær sjey lampurnar geva ljós yvir av ljósastakanum.

3 Og Aaron so gjørdi; hann kveikti hansara lampur yvir av ljósastakanum, eins og HARRIN skipaði Mósesi.

4 Og hetta verk ljósastakans *var av* slignum gulli, at skaftinum á honum, at blómunum á honum, *var* sligið verk: samsvarandi mynstrinum sum HARRIN hevði sýnt Mósesi, soleiðis gjørdi hann ljósastakan.

5 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

6 Tak Levitarnar burturúr Ísraels børnum, og reinsa teir.

7 Og svá skalt tú gera teimum, til at reinsa teir: Slett reinsanarvatn uppá teir, og lat teir raka alt kjøt sítt, og lat teir tváa klæðir síni, og *soleiðis* gera seg reinar.

8 Síðan lat teir taka ein ungan ungtarv við hansara matofri, *enntá* fínum mjøli blandaðum við olju, og ein annan ungan ungtarv skalt tú taka til eitt syndoffur.

9 Og tú skalt koma við Levitunum framfyri samkomu-tabernaklið: og tú skalt savna allan savnað Ísraels barna saman:

10 Og tú skalt koma við Levitunum framfyri HARRAN: og Ísraels børn skulu leggja sínar hendur uppá Levitarnar:

11 Og Aaron skal ofra Levitarnar framfyri HARRAN *til* eitt offur Ísraels barna, at teir mega útinna tænastu HARRANS.

12 Og Levitarnir skulu leggja sínar hendur uppá høvdini á ungtarvunum: og tú skalt ofra tann ēina *til* eitt syndoffur, og hīn *til* eitt brennioffur, at HARRANUM, til at gera eina sáttargerð fyri Levitarnar.

13 Og tú skalt stilla Levitarnar framfyri Aaron, og framfyri synir hansara, og ofra teir *til* eitt offur at HARRANUM.

14 Svá skalt tú atskilja Levitarnar Ísraels barna millum ífrá: og Levitarnir skulu vera mínir.

15 Og eftir tað skulu Levitarnir fara inn at gera tænastu samkomu-tabernakkulsins: og tú skalt reinsa teir, og ofra teir *til* eitt offur.

16 Tí at teir *eru* heil*veg*is givnir mær burturúr Ísraels børnum; ístaðin fyri slíkar sum opna hvørt

móðurlív, *enntá ístaðin fyri* frumburðirnar hjá øllum børnum Ísraels, havi eg tikið mær teir.

17 Tí at allir frumburðirnir hjá Ísraels børnum *eru* mínir, *bæði* maður og djór: á tí degi, tá ið eg sló hvønn frumburð í Egyptalandi, halgaði eg teir til mín sjálvs.

18 Og eg havi tikið Levitarnar fyri allar frumburðir Ísraels barna.

19 Og eg havi givið Levitarnar *sum* eina gávu til Aarons og til synir hansara Ísraels barna millum ífrá, til at gera tænastu Ísraels barna í samkomu-tabernaklinum, og til at gera eina sáttargerð fyri Ísraels børn: at tað veri eingin plága millum Ísraels barna, tá ið Ísraels børn koma í nánd at halgidóminum.

20 Og Móses, og Aaron, og øll samkoma Ísraels barna, gjørdu við Levitarnar samsvarandi øllum sum HARRIN ábjóðaði Mósesi viðvíkjandi Levitunum, soleiðis gjørdu Ísraels børn teimum.

21 Og Levitarnir vórðu skírgaðir, og teir tvógu klæðir síni; og Aaron ofraði teir *sum* eitt offur framfyri HARRAN; og Aaron gjørdi eina sáttargerð fyri teir til at reinsa teir.

22 Og eftir tað fóru Levitarnir inn at gera sína tænastu í samkomu-tabernaklinum frammi fyri Aaroni, og frammi fyri sonum hansara: eins og HARRIN hevði skipað Mósesi viðvíkjandi Levitunum, soleiðis gjørdu teir teimum.

23 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

24 Hetta *er tað* sum *tilhoyrir* Levitunum: frá tjúgu og fimm ára gomlum og uppeftir skulu teir fara inn at varta um tænastu samkomu-tabernakkulsins:

25 Og frá fimti ára aldri skulu teir gevast at varta um tænastuna *harav,* og skulu tæna ei meira:

26 Men skulu tæna við brøðrum sínum í samkomu-tabernaklinum, til at halda áleggingina, og skulu onga tænastu gera. Svá skalt tú gera Levitunum varðandi álegging teirra.

KAPITUL 9

OG HARRIN talaði við Móses í Sĭ-nâĭ-s oyðu, í tí fyrsta mánaðinum av øðrum árinum eftir *at* teir vóru komnir út úr Egyptalandi, sigandi,

2 Lat Ísraels børn eisini halda umleypið á hans ásettu tíð.

3 Í hinum fjúrtanda degi av hesum mánaði, um aftan, skulu tit halda tað á hans ásettu tíð: samsvarandi við allar skikkirnar av tí, og samsvarandi við allar siðareglurnar hjá tí, skulu tit halda tað.

4 Og Móses talaði við børn Ísraels, at teir skuldu halda umleypið.

5 Og teir hildu umleypið á tí fjúrtanda deginum av tí fyrsta mánaðinum um aftan í Sĭ-nâĭ-s oyðu: samsvarandi við alt sum HARRIN bjóðaði Mósesi, soleiðis gjørdu Ísraels børn.

6 ¶ Og tað vóru ávísir menn, sum vóru dálkaðir av deyða likaminum hjá einum manni, at teir kundu ikki halda umleypið á tí deginum: og teir komu framfyri Móses og framfyri Aaron á tí deginum:

7 Og teir menninir søgdu við hann, Vit *eru* dálkaðir av deyða likaminum hjá einum manni: hvørsvegna verða vit hildnir aftur, at vit mega ikki ofra eitt offur HARRANS í hans ásettu tíð millum Ísraels barna?

8 Og Móses segði við teir, Standið stillir, og eg vil hoyra hvat HARRIN vil bjóða viðvíkjandi tykkum.

9 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

10 Tala við børn Ísraels, sigandi, Um nakar maður av tykkum, ella av tykkar eftirkomarum, skal verða óreinur uppá grund av einum deyðum likami, ella *vera* á eini ferð langt burturi, tó skal hann halda umleypið at HARRANUM.

11 Hin fjúrtanda dagin av øðrum mánaðinum um aftan skulu teir halda tað, *og* eta tað við ósúrgaðum breyði og beiskum *urtum*.

12 Teir skulu einkið eftirlata av tí *fram* at morgninum, ella bróta nakað bein hjá tí: samsvarandi við allar regluskipanirnar hjá umleypinum skulu teir halda tað.

13 Men tann maðurin sum *er* reinur, og er ikki á eini ferð, og letur vera *við* at halda umleypið, enntá handa sama sál skal verða skorin av burturúr fólki hans: av tí at hann kom ikki við HARRANS ofri í hans ásettu tíð, tann maðurin skal bera synd sína.

14 Og um ein fremmandur skal útisita tykkara millum, og vilji halda umleypið at HARRANUM; samsvarandi við regluskipanina hjá umleypinum, og samsvarandi við háttarlag tess, soleiðis skal hann gera: tit skulu hava ein regluskipan, bæði fyri hin fremmanda, og fyri hann sum varð føddur í landinum.

15 ¶ Og á tí degi sum tabernaklið varð reist upp, dekkaði skýggið tabernaklið, *nevniliga,* vitnisburðar-tjaldið: og um aftan var uppiá tabernaklinum sum var tað útsjóndin á eldi, inntil morgunin.

16 Soleiðis var tað allan veg: skýggið dekkaði tað *um dagin,* og útsjóndin av eldi um nátt*ina*.

17 Og tá ið skýggið varð tikið upp frá tabernaklinum, tá aftaná tað ferðaðust Ísraels børn: og á tí plássi har skýggið varð *verandi,* har uppslógu Ísraels børn síni tjøld.

18 Eftir HARRANS ábjóðing ferðaðust Ísraels børn, og eftir HARRANS ábjóðing uppslógu teir: so leingi sum skýggið varð *verandi* uppiá tabernaklinum, hvíldu teir í tjøldum sínum.

19 Og tá ið skýggið dvaldi leingi uppiá tabernaklinum mangar dagar, tá hildu Ísraels børn HARRANS álegging, og ferðaðust ikki.

20 Og *soleiðis* var tað, tá ið skýggið var nakrar fáar dagar uppiá tabernaklinum; samsvarandi við HARRANS ábjóðing vórðu teir *verandi* í tjøldum sínum, og samsvarandi við HARRANS ábjóðing ferðaðust teir.

21 Og *soleiðis* var tað, tá ið skýggið varð *verandi* frá kvøldi at morgninum, og *at* skýggið varð tikið upp um morgunin, tá ferðaðust teir: hvørt *tað var* um dag*in* ella um nátt*ina,* at skýggið varð tikið upp, ferðaðust teir.

22 Ella *hvørt tað var* tveir dagar, ella ein mánað, ella eitt ár, at skýggið dvaldi uppiá tabernaklinum, verðandi hará, vórðu Ísraels børn *verandi* í tjøldum sínum, og ferðaðust ikki: men tá ið tað varð tikið upp, ferðaðust teir.

23 Eftir HARRANS ábjóðing hvíldu teir í tjøldunum, og eftir HARRANS ábjóðing ferðaðust teir: teir hildu HARRANS álegging, eftir HARRANS ábjóðing við hendi Móse.

KAPITUL 10

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Ger tær tveir lúðrar av silvuri; av einum heilum stykki skalt tú gera teir: at tú mást brúka teir til kallingina av savnaðinum, og til ferðingina hjá leirunum.

3 Og tá ið teir skulu blása við teimum, skal allur savnaðurin savna seg til tín við dyrnar á samkomu-tabernaklinum.

4 Og um teir blási *bert* við ēinum *lúðuri,* tá skulu prinsarnir, *sum eru* høvuðs*menn* av Ísraels túsundum, savna seg at tær.

5 Tá ið tit blása eina uppveking, tá skulu leirarnir, sum liggja á eystur pørtunum, fara frameftir.

6 Tá ið tit blása eina uppveking aðru ferðina, tá skulu leirarnir, sum liggja á suður síðuni, taka ferð sína: teir skulu blása eina uppveking fyri ferðir sínar.

7 Men tá ið samkoman eigur at verða savnað saman, skulu tit blása, men tit skulu ikki ljóða eina uppveking.

8 Og synir Aarons, prestarnir, skulu blása við lúðrunum; og teir skulu vera fyri tykkum til eina regluskipan um ævir út gjøgnum ættir tykkara.

9 Og um tit fari til kríggj í tykkara landi ímóti figgindanum sum kúgar tykkum, tá skulu tit blása eina uppveking við lúðrunum; og tit skulu verða mintir til frammi fyri HARRANUM Guði tykkara, og tit skulu verða frelstir frá tykkara figgindum.

10 Eisini á degi gleðis tykkara, og í tykkara hátíðardøgum, og í byrjanunum av tykkara mánaðum, skulu tit blása við lúðrunum yvir tykkara brennioffur˘, og yvir sláturofrini av tykkara friðofrum; at tey mega vera hjá tykkum til eitt minni frammi fyri Guði tykkara: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

11 ¶ Og tað hendi á hinum tjúgunda *degi* av øðrum mánaðinum, í øðrum árinum, at skýggið varð tikið upp oman av vitnisburðar-tabernaklinum.

12 Og Ísraels børn tóku ferðir sínar út úr Sī´-naī-s oyðu; og skýggið hvíldi í Pár´-ăn-s oyðu.

13 Og teir fyrst tóku ferð sína samsvarandi við HARRANS ábjóðing við^ hendi Móse.

14 ¶ Í tí fyrsta *plássinum* fór fánin hjá leirinum hjá Judah børnum samsvarandi við teirra herar: og yvir hansara herliði *var* Náh´-sjŏn Ăm-mĭn´-ă-dăb-s sonur.

15 Og yvir herliðinum av ættargrein Ĭs´-să-chār-s barna *var* Nĕth-á´-nēel Zū´-ār-s sonur.

16 Og yvir herliðinum av ættargrein Zē´-bū-lŏn-s barna *var* Ē´-lī-ăb Hē´-lŏn-s sonur.

17 Og tabernaklið varð tikið niður; og synir Gēr´-sjŏn-s og synir Mĕ-rār´-ī-s løgdu avstað, berandi tabernaklið.

18 ¶ Og fánin hjá Reūbens leiri legði avstað samsvarandi við teirra herar: og yvir hansara herliði *var* Ē´-lī-zūr Sjē´-dē-ūr-s sonur.

19 Og yvir herliðinum av ættargrein Símeons barna *var* Sjĕ-lū´-mĭ-ĕl Zū-rī-sjăd´-dāī-s sonur.

20 Og yvir herliðinum av ættargrein Gáds barna *var* Ē´-lī-ă-săph Deū´-ĕl-s sonur.

21 Og Kō-hăth-ĭt´-arnir løgdu avstað, berandi halgidómin: og *hīnir* settu upp tabernaklið ímóti tí *at* teir komu.

22 ¶ Og fánin hjá leiri Ē´-phrăĭm-s barna legði avstað samsvarandi við teirra herar: og yvir hansara herliði *var* Ē-lī-sjá´-mă Ăm´-mĭhŭd-s sonur.

23 Og yvir herliðinum av ættargrein Mă-năs´-sēh barna *var* Gămā´-lī-ĕl Pĕ-dāh´-zūr-s sonur.

24 Og yvir herliðinum av ættargrein Benjamins barna *var* Ā´-bīdăn Gī-dē-ō´-nī-s sonur.

25 ¶ Og fánin hjá leirinum hjá Dáns børnum legði avstað, *sum var* hin aftanverti av øllum leirunum út gjøgnum herliðini hjá teimum: og yvir hansara herliði *var* Ă-hī-ē´-zĕr Ăm-mī-sjăd´-dāī-s sonur.

26 Og yvir herliðinum av ættargrein Ásjers barna *var* Pá´-gī-ĕl Ō´-crăn-s sonur.

27 Og yvir herliðinum av ættargrein Năph´-tâ-lī-s barna *var* Á´-hīră Ē´-năn-s sonur.

28 Svá *vóru* ferðingar Ísraels barna samsvarandi við teirra herar, tá ið teir løgdu avstað.

29 ¶ Og Móses segði við Hó·dăb, son Rā´-gŭ-ĕl-s Mī-dī-ă-nīt´-a, verfaðir Mósesar, Vit ferðast at tí plássi, um hvørt HARRIN segði, Eg vil geva tykkum tað: kom tú við okkum, og vit vilja gera tær gott: tí at HARRIN hevur talað gott viðvíkjandi Ísrael.

30 Og hann segði við hann, Eg vil ikki fara; men eg vil fara avstað til egna lands míns, og til ættarfólks míns.

31 Og hann segði, Far ikki frá okkum, eg biði teg; við tað at tú veitst hvussu vit eiga at leirast í oyðuni, og tú kanst vera fyri okkum ístaðin fyri eygu.

32 Og tað skal verða, um tú fari við okkum, ja, tað skal verða, at hvørja góðsku *ið* HARRIN skal gera okkum, hina somu vilja vit gera tær.

33 ¶ Og teir fóru avstað frá fjalli HARRANS tríggja daga ferð: og ørk sáttmála HARRANS fór undan teimum á tríggja daga ferðini, at finna fram eitt hvíldarstað til teirra.

34 Og skýggj HARRANS *var* uppiá teimum um dag*in,* tá ið teir fóru út úr leirinum.

35 Og tað bar á, tá ið ørkin legði avstað, at Móses segði, Rís upp, HARRI, og lat tínar figgindar verða spjaddar; og lat teir, sum hata teg, flýggja frammi fyri tær.

36 Og tá ið tað hvíldi, segði hann, Vend aftur, O HARRI, at hinum mongu túsundum Ísraels.

KAPITUL 11

OG *tá ið* fólkið klagaði, mistoknaði tað HARRANUM: og HARRIN hoyrdi *tað;* og hansara firtni varð kynd; og HARRANS eldur brendi teirra millum, og uppslúkti *teir sum vóru* í teimum uttastu pørtunum av leirinum.

2 Og fólkið rópti á Móses; og tá ið Móses bað at HARRANUM, varð eldurin sløktur.

3 Og hann kallaði navnið á plássinum Tăb´-ĕ-râh: av tí at eldur HARRANS brendi teirra millum.

4 ¶ Og hin blandaða múgva, sum *var* teirra millum, fullu *í* at girnast: og Ísraels børn eisini grótu aftur, og søgdu, Hvør skal geva okkum kjøt at eta?

5 Vit minnast fiskin sum vit ótu í Egyptalandi frælsliga; agurkurnar, og melónirnar, og purrurnar, og leykarnar, og hvítleykin:

6 Men nú *er* okkara sál turkað burtur: *tað finst* einkið yvirhøvur, umframt hetta măn´-nă-ið, *frammi fyri* eygum várum.

7 Og măn´-nă-ið *var* sum koriandur fræ, og liturin hará sum liturin á bdellium.

8 *Og* fólkið fór íkring, og savnaði *tað,* og mól *tað* í kvørnum, ella stoytti *tað* í einum mortara, og bakaði *tað* í pannum, og gjørdi køkur úr tí: og smakkurin á tí var sum smakkurin á frískari olju.

9 Og tá ið døggin fell uppá leirin um náttina, fell măn´-nă-ið uppá tað.

10 ¶ Tá hoyrdi Móses fólkið gráta út gjøgnum teirra familjur, hvør maður í duri tjalds síns: og HARRANS firtni varð kynd stórligani; Móses eisini var mistoknaður.

11 Og Móses segði við HARRAN, Hvørsvegna hevurt tú nívt tænara tín? og hvørsvegna havi eg ikki funnið yndi í eygsjón tíni, at tú leggurt byrðina av øllum hesum fólkinum uppá meg?

12 Havi eg alið fram alt hetta fólk? havi eg gitið tey, at tú skuldirt siga við meg, Ber tey í barmi tínum, sum ein daddandi faðir ber hitt súgvandi barnið, at landinum sum tú svórt teirra fedrum?

13 Hvaðan skuldi eg havt kjøt

at geva øllum hesum fólkinum? tí at tey gráta at mær, sigandi, Gev okkum kjøt, at vit mega eta.

14 Eg eri ikki førur fyri at bera alt hetta fólk einsamallur, av tí at *tað er* ov tungt hjá mær.

15 Og um tú fari svá við mær, drep meg, eg biði teg, úr hond, um eg havi funnið yndi í eygsjón tíni; og lat meg ikki síggja mín vesældóm.

16 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Savna at mær sjeyti menn av hinum elstu av Ísrael, hvørjar tú veitst at vera hinir elstu fólksins, og yvirmenn yvir teimum; og kom við teimum at samkomu-tabernaklinum, at teir mega standa har við tær.

17 Og eg vil koma niður og tala við teg har: og eg vil taka av andanum sum *er* uppiá tær, og vil koyra *hann* uppá teir; og teir skulu bera byrði fólksins við tær, at tú beri *hana* ikki sjálvur aleinaur.

18 Og sig tú við fólkið, Halgið tykkum sjálvar ímóti í morgin, og tit skulu eta kjøt: tí at tit hava grátið í oyru HARRANS, sigandi, Hvør skal geva okkum kjøt at eta? tí at *tað var* væl *statt* hjá okkum í Egyptalandi: tí vil HARRIN geva tykkum kjøt, og tit skulu eta.

19 Tit skulu ikki eta ēin dag, ella tveir dagar, ella fimm dagar, eiheldur tíggju dagar, ella tjúgu dagar;

20 *Men* enntá ein heilan mánað, inntil tað komi út um tykkara nasarholˇ, og tað veri vamlisligt hjá tykkum: av tí at tit hava vanvirt HARRAN sum *er* tykkara millum, og hava grátið frammi fyri honum, sigandi, Hví komu vit fram út úr Egyptalandi?

21 Og Móses segði, Fólkið, hvørja millum eg *eri, eru* seks hundrað túsund fótmenn; og tú hevurt sagt, Eg vil geva teimum kjøt, at teir mega eta ein heilan mánað.

22 Skulu smáfæafylgini og stórfæafylgini verða vigin fyri teir, til at nøkta teir? ella skal allur fiskur havsins verða savnaður saman fyri teir, til at nøkta teir?

23 Og HARRIN segði við Móses, Er HARRANS hond vaksin stutt? tú skalt síggja nú hvørt orðið hjá mær skal bera á yvirfyri tær ella ikki.

24 ¶ Og Móses fór út, og segði fólkinum orðini hjá HARRANUM, og savnaði teir sjeyti menninar av fólksins elstu, og setti teir runt um tabernaklið.

25 Og HARRIN kom niður í einum skýggi, og talaði við hann, og tók av andanum sum *var* uppiá honum, og gav *hann* at hinum sjeyti elstu: og tað bar á, *at* tá ið andin hvíldi uppiá teimum, prophēteraðu teir, og góvust ikki.

26 Men tað vórðu verandi tveir *av* monn*un*um í leirinum, navnið hjá tí ēina *var* Ĕl´-dăd, og navnið hjá hīnum Mē´-dăd: og andin hvíldi uppiá teimum; og teir *vóru* av teimum sum vóru uppskrivaðir, men fóru ikki út at tabernaklinum: og teir prophēteraðu í leirinum.

27 Og tað rann ein ungur maður, og taldi Mósesi, og segði, Ĕl´-dăd og Mē´-dăd prophētera í leirinum.

28 Og Josjua Nuns sonur, tænari Mósesar, *ēin* av hans ungu monnum, svaraði og segði, Mín harri Móses, sýt teimum.

29 Og Móses segði við hann, Øvundart tú fyri mína skyld? gævi Guð at alt fólk HARRANS vóru prophētar, *og* at HARRIN vildi lagt sín anda uppá tey!

30 Og Móses slapp sær inn í leirin, hann og Ísraels elstu.

31 ¶ Og tað fór fram ein vindur frá HARRANUM, og kom við lynghøsnum frá sjónum, og læt *tey* falla við leirin, sum var tað eina dagsferð hesumegin, og sum var tað eina dagsferð hīnumegin,

rundan um leirin, og sum var tað tvær alnir *høgt* uppiá ásjón jarðarinnar.

32 Og fólkið stóð uppi allan tann dagin, og alla *ta nátt*ina, og allan tann næsta dagin, og tey savnaðu lynghøsnini: hann sum savnaði minst, savnaði tíggju hṓ-mĕr-ar: og teir spreiddu *tey* øll útumkring til sín sjálvs runt um leirin.

33 Og meðan kjøtið *var* enn ímillum teirra tenn, áður enn tað var tugt, varð vreiði HARRANS kynd ímóti fólkinum, og HARRIN sló fólkið við eini sera miklari plágu.

34 Og hann kallaði navnið á tí plássinum Kĭb́-rōth-hăt-tă-á́-vâh: av tí at har jarðaðu teir fólkið sum girnaðist.

35 *Og* fólkið ferðaðist frá Kĭb́-rōth-hăt-tă-á́-vâh at Há́-zĕ-rōth; og varð *verandi* í Há́-zĕ-rōth.

KAPITUL 12

OG Mirjam og Aaron talaðu ímóti Mósesi vegna hinnar Ê-thĭ-ṓ-pĭsk-u kvinnu, *við* hvørji hann hevði gift seg: tí at hann hevði gift seg *við* eini Ê-thĭ-ṓ-pĭsk-ari kvinnu.

2 Og tey søgdu, Hevur HARRIN í roynd *og veru* talað einans viðˆ Mósesi? hevur hann ikki talað eisini viðˆ okkum? Og HARRIN hoyrdi *tað*.

3 (Nú, maðurin Móses *var* sera eyðmjúkur, uppum allar menninar sum *vóru* uppiá ásjónini á allari jørðini.)

4 Og HARRIN talaði brádligani við Móses, og við Aaron, og við Mirjam, Komið út tit trý at samkomu-tabernaklinum. Og tey trý komu út.

5 Og HARRIN kom niður í stólpanum av skýgginum, og stóð *í* dyrnum av tabernaklinum, og kallaði Aaron og Mirjam: og tey bæði komu fram.

6 Og hann segði, Hoyrið nú míni orð: Um tað veri ein prophetur tykkara millum, *eg* HARRIN vil gera meg sjálvan kunnan yvirfyri honum í eini sjón, *og* vil tala við hann í einum dreymi.

7 Mín tænari Móses *er* ikki soleiðis, sum *er* trúfastur í øllum húsi mínum.

8 Við hann vil eg tala munn til munn, enntá sýniliga, og ikki í myrkum talum; og HARRANS líksemi skal hann skoða: hvørsvegna vóru tit tá ikki rædd at tala ímóti tænara mínum Mósesi?

9 Og HARRANS firtni varð kynd ímóti teimum; og hann fór avstað.

10 Og skýggið fór avstað oman av tabernaklinum; og sí, Mirjam *varð* spitølsk, *hvít* sum snjó: og Aaron hugdi uppá Mirjam, og sí, *hon var* spitølsk.

11 Og Aaron segði við Móses, Akk, harri mín, eg bøni teg, legg ikki syndina uppá okkum, í hvørji vit hava gjørt dársamliga, og í hvørji vit hava syndað.

12 Lat hana ikki vera sum ēitt deytt, hjá hvørjum kjøtið er hálv upptært, tá ið hann kemur út úr móðurlívi móður sínar.

13 Og Móses rópti á HARRAN, sigandi, Grøð hana nú, O Guð, eg bøni teg.

14 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Um hennara faðir hevði bert spýtt í andlit hennara, skuldi hon ikki skammast sjey dagar? lat hana verða lokaða úti frá leirinum sjey dagar, og eftir tað lat hana verða móttikna inn *aftur*.

15 Og Mirjam varð lokað úti frá leirinum sjey dagar: og fólkið ferðaðist ikki, til Mirjam var førd inn *aftur*.

16 Og síðan burtflutti fólkið frá Há́-zĕ-rōth, og sló upp í Páŕ-ăn-s oyðu.

KAPITUL 13

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,
2 Send tú menn, at teir mega kanna land Cānaans, sum eg havi givið børnum Ísraels: av hvørji ættargrein hjá teirra fedrum skulu tit senda ein mann, hvør *og* ēin stjórnari teirra millum.
3 Og Móses eftir HARRANS ábjóðan sendi teir frá Pár'ăn-s oyðu: allir teir menninir *vóru* høvuðs*menn* hjá Ísraels børnum.
4 Og hesi *vóru* nøvn teirra: av Reûbens ættargrein, Sjăm'-mû-ă Zăc'-cûr-s sonur.
5 Av Símeons ættargrein, Sjá'-phăt Hó'-rī-s sonur.
6 Av Judah ættargrein, Caleb Jē'-phŭn-nêh sonur.
7 Av Ĭs'-să-chār-s ættargrein, Ĭ'-găl Jósephs sonur.
8 Av Ē'-phră-ĭm-s ættargrein, Ó-sjē'-ă Nuns sonur.
9 Av Benjamins ættargrein, Păl'-tī Rā'-phû-s sonur.
10 Av Zē'-bŭ-lŏn-s ættargrein, Găd'-dî-ĕl Sō'-dī-s sonur.
11 Av Jósephs ættargrein, *nevniliga,* av Mă-năs'-sēh ættargrein, Găd'-dî Sū'-sī-s sonur.
12 Av Dáns ættargrein, Ăm'-mĭ-ĕl Gĕ-măl'-lī-s sonur.
13 Av Ásjers ættargrein, Sē'-thûr Michaels sonur.
14 Av Năph'-tâ-lī-s ættargrein, Năh'-bī Vŏph'-sī-s sonur.
15 Av Gáds ættargrein, Geu'-ĕl Má'-chī-s sonur.
16 Hesi *eru* nøvnini hjá monnunum sum Móses sendi at njósna út landið. Og Móses kallaði Ó-sjē'-ă Nuns son Jē-hō'-sjŭ-ă.
17 ¶ Og Móses sendi teir at njósna út land Cānaans, og segði við teir, Sleppið tykkum upp henda *vegin* suðureftir, og farið niðan á fjallið:
18 Og skoðið landið, hvat tað *er;* og fólkið sum býr hará, hvørt teir *veri* sterkir ella veikir, fáir ella mangir;
19 Og hvat landið *er* sum teir dvøljast í, hvørt tað *veri* gott ella ringt; og hvørjir staðir *teir veri* sum tey dvøljast í, hvørt í tjøldum, ella í hervirkjum;
20 Og hvat landið *er,* hvørt tað *veri seg* feitt ella soltið, hvørt tað veri *seg* viður hará, ella ikki. Og verið tit við gott treyst, og førið av ávøksti landsins. Nú, tíðin *var* tíðin av hinum frumstadnu víndrúvum.
21 ¶ So teir fóru upp, og kannaðu landið frá Zīns oyðu at Rē'-hŏb, sum menn koma til Há'-măth.
22 Og teir stigu niður eftir suðuri, og komu at Hē'-brŏn; har Á'-hĭ-măn, Sjē'-sjāi, og Tăl'-māi, børn Ánaks, *vóru.* (Nú, Hē'-brŏn varð bygt sjey ár áðrenn Zō'-ăn í Egyptalandi.)
23 Og teir komu at áarløki Ĕsj'-cŏl-s, og skóru niður haðani frá eina grein við ēinum tyssi av víndrúvum, og teir bóru tað ímillum tveir uppiá einum stavi; og *teir komu við* av granateplunum, og av fikunum.
24 Staðið varð kallað áarløkurin Ĕsj'-cŏl, uppá grund av tyssinum av víndrúvum sum Ísraels børn skóru niður haðani frá.
25 Og teir vendu aftur frá at kanna landið, eftir fjøruti dagar.
26 ¶ Og teir fóru og komu til Móse, og til Aarons, og til alrar samkomu Ísraels barna, at Pár'-ăn-s oyðu, til Ká'-dĕsj; og bóru teimum orð aftur, og allari samkomuni, og sýndu teimum ávøkst landsins.
27 Og teir taldu honum, og søgdu, Vit komu at landinum, hvagar tú sendirt okkum, og vissuligani, tað flýtur við mjólk og hunangi; og hetta *er* ávøksturin av tí.
28 Hóast hetta, fólkið *veri*

sterkir sum dvøljast í landinum, og staðirnir *eru* múraðir, *og* sera miklir: og harafturat sóu vit børn Ánaks har.

29 Â-măl-ĕk-ĭt´-arnir dvøljast í landi suðursins: og Hittitarnir, og Jĕb-ŭ-sĭt´-arnir, og Amoritarnir, dvøljast í fjøllunum: og Cānaanitarnir dvøljast við sjógvin, og við bredda Jordans.

30 Og Caleb sissaði fólkið frammi fyri Mósesi, og segði, Latum okkum fara niðan alt fyri eitt, og *taka* tað til ognar; tí at vit eru væl førir fyri at yvirvinna tað.

31 Men menninir, sum fóru niðan við honum, søgdu, Vit veri ikki førir fyri at fara niðan ímóti fólkinum; tí at teir *eru* sterkari enn vit.

32 Og teir førdu upp eitt ilt ummæli um landið, sum teir høvdu kannað, yvirfyri Ísraels børnum, sigandi, Landið, ígjøgnum hvørt vit eru farnir at kanna tað, *er* eitt land sum etur upp íbúgvar tess; og alt fólkið, sum vit sóu í tí, *eru* menn av miklum vakstrarmáli.

33 Og har sóu vit risarnar, synir Ánaks, *sum koma* av risunum: og vit vóru í okkara egnu eygsjón sum grashoppur, og soleiðis vóru vit *eisini* í teirra eygsjón.

KAPITUL 14

OG øll samkoman lyfti upp rødd sína, og rópti; og fólkið græt ta náttina.

2 Og øll børn Ísraels meylaðu ímóti Mósesi og ímóti Aaroni: og øll samkoman segði við teir, Gævi Guð at vit høvdu doyð í Egyptalandi! ella gævi Guð vit høvdu doyð í hesi oyðuni!

3 Og hvørsvegna hevur HARRIN ført okkum at hesum landinum, at falla við svørðinum, at várar konur og vári børn skuldu verða ein fongur? var tað ikki betri hjá okkum at venda aftur inn í Egyptaland?

4 Og teir søgdu hvør til annan, Latum okkum gera ein høvuðsmann, og latum okkum snúgva aftur inn í Egyptaland.

5 Tá fullu Móses og Aaron á síni andlit frammi fyri øllum savnaðinum av samkomu Ísraels barna.

6 ¶ Og Josjua Nuns sonur, og Caleb Jē´-phŭn-nêh sonur, *sum vóru* av teimum sum kannaðu landið, skræddu klæðir síni:

7 Og teir talaðu við allan flokkin av Ísraels børnum, sigandi, Landið, sum vit fóru ígjøgnum at kanna tað, *er* eitt ovurhonds gott land.

8 Um HARRIN fragdist í okkum, so vil hann føra okkum inn í hetta landið, og geva okkum tað; eitt land sum flýtur við mjólk og hunangi.

9 Einans gerið ikki tit uppreist ímóti HARRANUM, eiheldur óttist tit fólk landsins; tí at teir *eru* breyð hjá okkum: teirra verja er farin burtur frá teimum, og HARRIN *er* við okkum: óttist teir ikki.

10 Men øll samkoman beyð steina teir við steinum. Og dýrd HARRANS birtist í samkomu-tabernaklinum frammi fyri øllum børnum Ísraels.

11 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Hvussu leingi vil hetta fólkið tirra meg? og hvussu leingi vil tað vera áður enn teir trúgva mær, fyri øll teknini sum eg havi sýnt teirra millum?

12 Eg vil sláa teir við drepsóttini, og gera teir arvleysar, og vil gera úr tær eina miklari tjóð og mektigari enn teir.

13 ¶ Og Móses segði við HARRAN, So skulu Egyptarnir hoyra *tað*, (tí at tú førdirt upp hetta fólk í tínum mátti burtur úr teimum;)

14 Og teir vilja siga *tað* fyri íbúgvum hesa lands: *tí at* teir hava hoyrt at tú, HARRI, *ert*

millum hesa fólks, at tú, HARRI, verðurt sæddur andlit til andlits, og *at* títt skýggj stendur yvir teimum, og *at* tú fert undan teimum, um dagsleitið í einum stólpa av einum skýggi, og í einum stólpa av eldi um nátt*ina*.

15 ¶ Nú, *um* tú skalt drepa *alt* hetta fólkið sum ēin mann, tá vilja tjóðirnar, sum hava hoyrt gitið um teg, tala, sigandi,

16 Av tí at HARRIN var ikki førur fyri at føra hetta fólk inn í landið sum hann svór teimum, tí hevur hann vigið teir í oyðuni.

17 Og nú, eg bøni teg, lat mátt Harra míns vera miklan, samsvarandi sum tú hevurt talað, sigandi,

18 HARRIN *er* langmóðigur, og av miklari miskunn, fyrigevandi misgerð og misbrot, og viðˆ ongum midlum fríkennandi *hin seka*, heimsøkjandi fedranna misgerð omanyvir børnini at hinum triðja og fjórða *ættarliði*.

19 Tilgev, eg bøni teg, misgerðina hjá hesum fólki samsvarandi við mikilleikan av tíni miskunn, og eins og tú hevurt fyrigivið hesum fólkinum, frá Egyptalandi enntá inntil nú.

20 Og HARRIN segði, Eg havi tilgivið samsvarandi við títt orð:

21 Men *so* sanniliga *sum* eg livi, øll jørðin skal verða fylt við dýrd HARRANS.

22 Av tí at allir hasir menninir sum hava sæð mína dýrd, og mínar kraftargerðir, sum eg gjørdi í Egyptalandi og í oyðuni, og hava freistað meg nú hesar tíggju ferðir, og hava ikki givið gætur eftir rødd míni;

23 Vissuligani, teir skulu ikki síggja landið sum eg svór teirra fedrum, eiheldur skal nakar av teimum sum tirraðu meg síggja tað:

24 Uttan tænari mín Caleb, av tí at hann hevði ein annan anda við sær, og hevur fylgt mær full-*veg*is, hann vil eg føra inn í landið, hvarinní hann fór; og hansara sáð skal ognast tað.

25 (Nú, Â-măl-ĕk-īt′-arnir og Cānaanitarnir búðu í dalinum.) Í morgin snúgvið tykkum, og sleppið tykkum inn í oyðuna eftir Reyða-havs veginum.

26 ¶ Og HARRIN talaði við Móses og við Aaron, sigandi,

27 Hvussu leingi *skal eg bera yvir við* hesi illu samkomu, sum meyla ímóti mær? eg havi hoyrt meylanir Ísraels barna, sum teir meyla ímóti mær.

28 Sig við teir, *So sanniliga sum* eg livi, sigur HARRIN, eins og tit hava talað í míni oyru, soleiðis vil eg gera við tykkum:

29 Tykkara lík skulu falla í hesi oyðuni; og allir sum vórðu upptaldir av tykkum, samsvarandi við alt tykkara tal, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, sum hava meylað ímóti mær,

30 Ivaleyst, tit skulu ikki koma inn í landið, *viðvíkjandi* hvørjum eg svór at fáa tykkum *at* dvøljast hará, uttan Caleb Jĕ′-phŭn-nēh sonur, og Josjua Nuns sonur.

31 Men hini smáu tykkara, sum tit søgdu skuldu verða ein fongur, tey vil eg føra inn, og tey skulu kenna landið sum tit hava vanvirt.

32 Men *hvat* tykkum *viðvíkur*, tykkara lík, tey skulu falla í hesi oyðuni.

33 Og tykkara børn skulu reika *um* í oyðuni *í* fjøruti ár, og bera tykkara hordómar, inntil tykkara lík verði tærd í oyðuni.

34 Eftir talinum á døgunum, í hvørjum tit kannaðu landið, *enntá* fjøruti dagar, hvør dagur fyri eitt ár, skulu tit bera tykkara misgerðir, *enntá* fjøruti ár, og tit skulu kenna mín brest á lyfti.

35 Eg HARRIN havi sagt, eg vil

vissuligani inna tað at allari hesi óndu samkomu, sum eru savnaðir saman ímóti mær: í hesi oyðuni skulu teir verða upptærdir, og har skulu teir doyggja.

36 Og teir menninir, sum Móses sendi at kanna landið, sum komu aftur, og fingu alla samkomuna at meyla ímóti honum, við at koma upp við einum illmæli omanyvir landið,

37 Enntá hasir menninir sum førdu upp hitt illa ummæli uppá landið, doyðu av pláguni frammi fyri HARRANUM.

38 Men Josjua Nuns sonur, og Caleb Jē´-phŭn-nêh sonur, *sum vóru* av teimum monnunum sum fóru at kanna landið, livdu *enn*.

39 Og Móses taldi øllum Ísraels børnum hesar framsagnir: og fólkið græt stórligani.

40 ¶ Og teir risu upp árla um morgunin, og sluppu sær niðan á toppin av fjallinum, sigandi, Sí, vit *veri her,* og vilja fara niðan at plássinum sum HARRIN hevur lovað: tí at vit hava syndað.

41 Og Móses segði, Hvørsvegna nú misbróta tit boðið hjá HARRANUM? men tað skal ikki blóma.

42 Farið ikki niðan, tí at HARRIN *er* ikki tykkara millum; at tit verði ikki slignir frammi fyri tykkara fíggindum.

43 Tí at Â-măl-ēk-īt´-arnir og Cānaanitarnir *eru* har frammanfyri tykkum, og tit skulu falla við svørðinum: av tí at tit eru vendir burtur frá HARRANUM, tí vil HARRIN ikki vera við tykkum.

44 Men teir dittaðu sær at fara niðan at toppinum av heygnum: hóast hetta, ørk sáttmála HARRANS, og Móses, fóru ikki avstað út úr leirinum.

45 Tá komu Â-măl-ēk-īt´-arnir oman, og Cānaanitarnir sum dvaldust á tí heygnum, og slógu teir, og avhólvaðu teir, *enntá* at Hŏr´-măh.

KAPITUL 15

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Tá ið tit verði komnir inn í landið av tykkara bústøðum, sum eg gevi tykkum,

3 Og vilja gera eitt offur við eldi at HARRANUM, eitt brennioffur, ella eitt sláturoffur í at útinna eitt heiti, ella í einum fríviljaofri, ella í tykkara hátíðar-veitslum, til at gera ein søtan anga at HARRANUM, av smáfæafylginum, ella av stórfæafylginum:

4 Tá skal hann, sum ofrar sítt offur at HARRANUM, koma við einum matofri av einum tíggjunddeili av mjøli, blandaðum við fjórðings*part*in av eini hín av olju.

5 Og fjórðings*part*in av eini hín av víni til eitt drykkoffur skalt tú fyribúgva við brenniofrinum ella sláturofri*num,* fyri ēitt lamb.

6 Ella fyri ein veðr skalt tú fyribúgva *til* eitt matoffur tveir tíggjunddeilir av mjøli, blandað við triðjings*part*in av eini hín av olju.

7 Og til eitt drykkoffur skalt tú ofra triðjings*part*in av eini hín av víni, *til* ein søtan anga at HARRANUM.

8 Og tá ið tú fyribýrt ein ungtarv *til* eitt brennioffur, ella *til* eitt sláturoffur í at útinna eitt heiti, ella friðoffur at HARRANUM:

9 Tá skal hann føra við einum ungtarvi eitt matoffur á tríggjar tíggjunddeilir av mjøli, blandað við eina hálva hín av olju.

10 Og tú skalt føra til eitt drykkoffur eina hálva hín av víni, *til* eitt offur gjørt við eldi, av einum søtum anga at HARRANUM.

11 Svá skal tað verða gjørt fyri ēin ungtarv, ella fyri ēin veðr, ella fyri eitt lamb, ella eitt geitarlamb.

12 Samsvarandi við talið sum tit skulu fyribúgva, soleiðis skulu tit gera við hvørt *og* ēitt samsvarandi við teirra tal.

13 Allir, sum eru føddir hjá landinum, skulu gera hesi ting eftir hesum háttarlagi, í at ofra eitt offur gjørt við^ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM.

14 Og um ein fremmandur útisiti hjá tykkum, ella hvørsumhelst *ið veri seg* tykkara millum í ættarliðum tykkara, og vilji ofra eitt offur gjørt við^ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM; eins og tit gera, soleiðis skal hann gera.

15 Ēin regluskipan *skal vera bæði* fyri tykkum av samkomuni, og eisini fyri hin fremmanda sum útisitur *hjá tykkum*, ein regluskipan um ævir í ættarliðum tykkara: eins og tit *eru,* soleiðis skal hin fremmandi vera frammi fyri HARRANUM.

16 Ēin lóg og ēitt háttarlag skal vera fyri tykkum, og fyri hin fremmanda sum útisitur hjá tykkum.

17 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

18 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Tá ið tit koma inn í landið, hvagar eg føri tykkum,

19 Tá skal tað verða, at tá ið tit eta av breyði landsins, skulu tit ofra upp eitt hevjioffur at HARRANUM.

20 Tit skulu ofra upp eina køku av tí fyrsta av tykkara deiggi *til* eitt hevjioffur: eins og *tit gera við* hevjioffur treskigólvsins, soleiðis skulu tit hevja tað.

21 Av tí fyrsta av tykkara deiggi skulu tit geva at HARRANUM eitt hevjioffur í ættarliðum tykkara.

22 ¶ Og um tit havi farið skeivir, og ikki hildið øll hesi boðini sum HARRIN hevur talað við Móses,

23 *Enntá* alt sum HARRIN hevur áboðið tykkum við^ hendi Móse, frá tí degi sum HARRIN skipaði *Mósesi,* og haðanfram-eftir millum ættarliðir tykkara;

24 So skal tað verða, um *okkurt* veri *seg* framt við^ vankunnu uttan kunnleika samkomunnar, at øll samkoman skal ofra ēin ungan ungtarv til eitt brennioffur, til ein søtan anga at HARRANUM, við hansara matofri, og hansara drykkofri, samsvarandi við háttarlagið, og ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur.

25 Og presturin skal gera eina sáttargerð fyri alla samkomu Ísraels barna, og tað skal verða fyrigivið teimum; tí at tað *er* vankunna: og teir skulu koma við sínum ofri, einum sláturofri gjørdum við^ eldi at HARRANUM, og sínum syndofri framfyri HARRAN, fyri sína vankunnu:

26 Og hon skal verða fyrigivin allari samkomu Ísraels barna, og tí fremmanda sum útisitur teirra millum; eftirsum øll fólkini *vóru* í vankunnu.

27 ¶ Og um nøkur sál syndi gjøgnum vankunnu, tá skal hann koma við eini fyrsta árs hon geit til eitt syndoffur.

28 Og presturin skal gera eina sáttargerð fyri ta sál sum syndar vankunnugliga, tá ið hann syndar við^ vankunnu frammi fyri HARRANUM, til at gera eina sáttargerð fyri hann; og tað skal verða fyrigivið honum.

29 Tit skulu hava ēina lóg fyri hann sum syndar gjøgnum vankunnu, *bæði fyri* hann sum er føddur Ísraels barna millum, og fyri hin fremmanda sum útisitur teirra millum.

30 ¶ Men tann sál sum ger *okkurt* framførnisliga, *hvørt hann veri seg* føddur í landinum, ella ein fremmandur, hin sami háðar HARRAN; og handa sál skal verða skorin av burturúr fólki hans.

31 Av tí at hann hevur vanvirt

ord HARRANS, og hevur brotið boð hans, handa sál skal verða aldeilis skorin av; hansara misgerð *skal vera* uppiá honum.

32 ¶ Og meðan Ísraels børn vóru í oyðuni, funnu teir ein mann sum savnaði greinar á sabbatsdeginum.

33 Og teir, sum funnu hann savnandi greinar, komu við honum at Mósesi og Aaroni, og at allari samkomuni.

34 Og teir settu hann í varðhald, av tí at tað var ikki kunngjørt hvat skuldi verða gjørt við hann.

35 Og HARRIN segði við Móses, Maðurin skal vissuligani verða tikin av lívi: øll samkoman skal steina hann við steinum uttanfyri leirin.

36 Og øll samkoman førdi hann útum leirin, og steinaði hann við steinum, og hann doyði; eins og HARRIN skipaði Mósesi.

37 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

38 Tala við børn Ísraels, og skipa teimum at teir geri sær frynsar í kantarnar á klæðum sínum út gjøgnum ættarliðir sínar, og at teir seti uppá frynsin á kantunum eitt band av bláum:

39 Og tað skal vera tykkum til ein fryns, at tit mega hyggja uppá hann, og minnast øll boðini hjá HARRANUM, og gera tey; og at tit søki ikki eftir tykkara egna hjarta og tykkara egnu eygum, eftir hvørjum tit plaga at fara horandi:

40 At tit mega minnast, og gera øll míni boð, og vera heilagir yvirfyri Guði tykkara.

41 Eg *eri* HARRIN Guð tykkara, sum førdi tykkum út úr Egyptalandi, til at vera Guð tykkara: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

KAPITUL 16

NÚ, Kōr´-ăh, sonur Ĭz´-hâr-s, sonur Kō´-hăth-s, sonur Levī-s; og Dá´-thăn og Á´-bĭ-răm, synir Ē´-lī-ăb-s; og Ón, sonur Pē´-lĕth-s; synir hjá Rēūben, tóku *menn:*

2 Og teir risu upp frammi fyri Mósesi, við ávísum av børnum Ísraels, tvey hundrað og fimti prinsar savnaðarins, navngitnir í samkomuni, navnfremis menn:

3 Og teir savnaðu seg ímóti Mósesi og ímóti Aaroni, og søgdu við teir, *Tit taka* ov mikið uppá tykkum, eftirsum *at* øll samkoman *eru* heilagir, hvør *og* ēin av teimum, og HARRIN *er* teirra millum: hvørsvegna tá lyfta tit upp tykkum sjálvar uppum samkomu HARRANS?

4 Og tá ið Móses hoyrdi *tað,* fell hann uppá andlit sítt:

5 Og hann talaði við Kōr´-ăh og við alt hansara samlag, sigandi, Enntá í morgin vil HARRIN sýna hvørjir *eru* hansara, og *hvør er* heilagur; og vil volda *honum* at koma nær sær: enntá *honum,* sum hann hevur valt, vil hann volda at koma nær sær.

6 Hetta gerið; Takið tykkum roykilsis-pannur, Kōr´-ăh, og allur hansara flokkur;

7 Og koyrið eld harí, og koyrið roykilsi í tær frammi fyri HARRANUM í morgin: og tað skal verða, *at* tann maðurin sum HARRIN velur, hann *skal vera* heilagur: *tit taka* ov mikið uppá tykkum, tit synir Levīs.

8 Og Móses segði við Kōr´-ăh, Hoyrið, eg biði tykkum, tit synir Levīs:

9 *Tykist tað bert* eitt lítið ting yvirfyri tykkum, at Ísraels Guð hevur atskilt tykkum frá samkomu Ísraels, til at føra tykkum nær til sín sjálvs at gera tænastu tabernakkuls HARRANS, og at standa frammi fyri samkomuni at tæna at teimum?

10 Og hann hevur ført teg nær *til sín,* og allar tínar brøður, synir Levīs, við tær: og søkja tit prestadømið eisini?

11 Fyri hvørja grund *bæði* tú og alt títt samlag *eru* savnaðir saman ímóti HARRANUM: og hvat *er* Aaron, at tit meyla ímóti honum?

12 ¶ Og Móses sendi til *tess* at kalla Dá´-thăn og Á´-bĭ-răm, synir Ē´-lĭ-ăb-s: sum søgdu, Vit vilja ikki koma niðan:

13 *Er tað* eitt lítið ting, at tú hevurt ført okkum upp úr einum landi sum flýtur við mjólk og hunangi, til at drepa okkum í oyðuni, uttan *at* tú geri teg sjálvan aldeilis *til* ein prins yvir okkum?

14 Harafturat hevurt tú ikki ført okkum inn í eitt land sum flýtur við mjólk og hunangi, ella givið okkum arv av akrum og víngørðum: vilt tú stinga út eyguni á hesum monnunum? vit vilja ikki koma niðan.

15 Og Móses varð sera vreiður, og segði við HARRAN, Gevi ikki tú gætur eftir teirra ofri: eg havi ikki tikið ēin asna frá teimum, eiheldur havi eg meinað ēin av teimum.

16 Og Móses segði við Kōr´-ăh, Ver tú og alt títt samlag frammi fyri HARRANUM, tú, og teir, og Aaron, í morgin:

17 Og taki hvør maður sína roykilsis-pannu, og koyrið roykilsi í tær, og førið tit framfyri HARRAN hvør maður sína roykilsis-pannu, tvey hundrað og fimti roykilsis-pannur; tú eisini, og Aaron, hvør *av tykkum* sína roykilsis-pannu.

18 Og teir tóku hvør maður sína roykilsis-pannu, og koyrdu eld í tær, og løgdu roykilsi hará, og stóðu í dyrnum av samkomu-tabernaklinum við Mósesi og Aaroni.

19 Og Kōr´-ăh savnaði alla samkomuna ímóti teimum at dyrnum av samkomu-tabernaklinum: og dýrd HARRANS birtist at allari samkomuni.

20 Og HARRIN talaði við Móses og við Aaron, sigandi,

21 Atskiljið tykkum sjálvar burturúr hesi samkomuni, at eg má upptæra teir í einum tíðarbragdi.

22 Og teir fullu uppá síni andlit, og søgdu, O Guð, Guð˜ hjá andunum av øllum kjøti, skal ēin maður synda, og vilt tú vera vreiður við alla samkomuna?

23 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

24 Tala við samkomuna, sigandi, Sleppið tykkum upp frá íkring tabernakkul Kōr´-ăh, Dá´-thăn-s, og Á´-bĭ-răm-s.

25 Og Móses reis upp og fór at Dá´-thăn-i og Á´-bĭ-răm-i; og teir elstu av Ísrael fylgdu honum.

26 Og hann talaði við samkomuna, sigandi, Farið burtur, eg biði tykkum, frá tjøldunum hjá hesum vondu monnunum, og nemið ikki við nakað av teirra, at ikki tit verði upptærdir í øllum teirra syndum.

27 So teir fóru upp frá tabernaklinum hjá Kōr´-ăh, Dá´-thăn-i, og Á´-bĭ-răm-i, á hvørjari síðu: og Dá´-thăn og Á´-bĭ-răm komu út, og stóðu í dyrnum av tjøldum sínum, og konur teirra, og synir teirra, og teirra lítlu børn.

28 Og Móses segði, Herav skulu tit vita, at HARRIN hevur sent meg at gera øll hesi verk; tí at *eg havi* ikki *gjørt tey* av mínum egna sinni.

29 Um hesir menn doyggi hin meiniga deyða hjá øllum monnum, ella um teir verði heimsóktir eftir heimsóknini hjá øllum monnum; *so* hevur HARRIN ikki sent meg.

30 Men um HARRIN geri ein nýggjan lut, og jørðin opni sín munn, og svølgi teir upp, við øllum sum *tilhoyra* teimum, og teir fari niður skjótt inn í holuna; so skulu tit skilja, at hesir menninir hava tirrað HARRAN.

31 ¶ Og tað bar á, sum hann hevði lokið við at tala øll hesi orð, at jørðin kleyv sundur, sum *var* undir teimum:
32 Og jørðin opnaði sín munn, og svølgdi teir upp, og húsini hjá teimum, og allar menninar sum *tilhoyrdu* Kōr´-ăh, og alt *teirra* góðs.
33 Teir, og alt sum *hoyrdi til* teirra, fór niður livandi inn í holuna, og jørðin lokaðist uppá teir: og teir glataðust burturúr samkomuni.
34 Og alt Ísrael, sum *vóru* runt um teir, flýddu við rópið av teimum: tí at teir søgdu, Bara ikki jørðin svølgi upp okkum *eisini*.
35 Og tað kom út ein eldur frá HARRANUM, og upptærdi teir tvey hundrað og fimti menninar sum ofraðu roykilsi.
36 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
37 Tala við Ĕl-ĕ-ā´-zâr, son Aarons prests, at hann taki upp roykilsis-pannurnar út úr brennuni, og spjað tú eldin haryviri; tí at tær eru halgaðar.
38 Roykilsis-pannurnar hjá hesum syndarunum ímóti teirra egnu sálum, lat teir gera tær *til* breiðar plátur *til* eina dekking av altarinum: tí at teir ofraðu tær frammi fyri HARRANUM, tí eru tær halgaðar: og tær skulu vera eitt tekin at Ísraels børnum.
39 Og Ĕl-ĕ-ā´-zâr prestur tók messing roykilsis-pannurnar, við hvørjum teir, sum vóru brendir, høvdu ofrað; og tær vórðu gjørdar *til* breiðar *plátur til* eina dekking av altarinum:
40 *Til at vera* eitt minni yvirfyri Ísraels børnum, at eingin fremmandur, sum *er* ikki av sáði Aarons, komi nær at ofra roykilsi frammi fyri HARRANUM; at hann veri ikki sum Kōr´-ăh, og sum hansara flokkur: eins og HARRIN segði til hansara við hendi Móse.
41 ¶ Men á morgindeginum meylaði øll samkoman av Ísraels børnum ímóti Mósesi og ímóti Aaroni, sigandi, Tit hava dripið fólk HARRANS.
42 Og tað bar á, tá ið samkoman var savnað ímóti Mósesi og ímóti Aaroni, at teir hugdu ímóti samkomu-tabernaklinum: og sí, skýggið huldi tað, og dýrd HARRANS birtist.
43 Og Móses og Aaron komu framfyri samkomu-tabernaklið.
44 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
45 Sleppið tykkum upp burturúr hesi samkomuni, at eg má upptæra teir sum í einum tíðarbragdi. Og teir fullu uppá síni andlit.
46 ¶ Og Móses segði við Aaron, Tak eina roykilsis-pannu, og koyr eld harí oman av altarinum, og koyr roykilsi á, og far snarligani at samkomuni, og ger eina sáttargerð fyri teir: tí at tað er vreiði farin út frá HARRANUM; plágan er byrjað.
47 Og Aaron tók sum Móses bjóðaði, og rann inn í miðja samkomuna; og sí, plágan var byrjað millum fólksins: og hann koyrdi roykilsi á, og gjørdi eina sáttargerð fyri fólkið.
48 Og hann stóð ímillum hinar deyðu og hinar livandi; og plágan varð steðgað.
49 Nú teir, sum doyðu í páguni, vóru fjúrtan túsund og sjey hundrað; umframt teir sum doyðu kring málevni Kōr´-ăh.
50 Og Aaron kom aftur at Mósesi at dyrnum á samkomu-tabernaklinum: og plágan var steðgað.

KAPITUL 17

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,
2 Tala við børn Ísraels, og tak av hvørjum *og* ēinum av teimum ein stav samsvarandi við húsið hjá fedrum *teirra,* av øllum teirra

prinsum samsvarandi við húsið hjá teirra fedrum tólv stavar: rita tú hvørs mans navn uppá hansara stav.

3 Og tú skalt rita navn Aarons uppá stav Levīs: tí at ēin stavur *skal vera* fyri høvuðs*mann*in av húsi fedra teirra.

4 Og tú skalt leggja teir niðurfyri í samkomu-tabernaklinum frammanfyri vitnisburðin, har eg vil møtast við tykkum.

5 Og tað skal bera á, *at* stavur tess mans, hvønn eg skal velja, skal blómka: og eg vil fáa at halda uppat frá mær meylanirnar hjá Ísraels børnum, við hvørjum teir meyla ímóti tykkum.

6 ¶ Og Móses talaði við børn Ísraels, og hvør *og* ēin av teirra prinsum gav honum ein stav stykkið, fyri hvønn prins ēin, samsvarandi við húsini hjá teirra fedrum, *enntá* tólv stavar: og stavur Aarons *var* millum stava teirra.

7 Og Móses legði niðurfyri stavarnar frammi fyri HARRANUM í vitnisburðar-tabernaklinum.

8 Og tað bar á, at á morgindeginum fór Móses inn í vitnisburðar-tabernaklið; og sí, stavur Aarons fyri hús Levīs var spíraður, og bar fram knappar, og blómaði blómingar, og veitti mandlur.

9 Og Móses førdi út allar stavarnar frá frammi fyri HARRANUM at øllum børnum Ísraels: og teir hugdu, og tóku hvør maður sín stav.

10 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Kom við stavi Aarons aftur framfyri vitnisburðin, at verða goymdur til eitt tekin ímóti uppreistrarmonnunum; og tú skalt heilt taka burt teirra meylanir frá mær, at teir doyggi ei.

11 Og Móses *so* gjørdi: eins og HARRIN skipaði honum, soleiðis gjørdi hann.

12 Og Ísraels børn talaðu við Móses, sigandi, Sí, vit doyggja, vit farast, vit allir farast.

13 Hvørsumhelst *ið* kemur nakað ting nær tabernakli HARRANS, skal doyggja: skulu vit verða upptærdir við doygging?

KAPITUL 18

OG HARRIN segði við Aaron, Tú og synir tínir og hús faðirs tíns við tær skulu bera misgerð halgidómsins: og tú og synir tínir við tær skulu bera misgerð prestadømis tykkara.

2 Og tínir brøður eisini av ættargrein Levīs, ættargrein faðirs tíns, før tú við tær, at teir mega vera sameintir at tær, og tæna at tær: men tú og synir tínir við tær *skulu tæna* frammanfyri vitnisburðar-tabernaklinum.

3 Og teir skulu halda álegging tína, og áleggingina hjá øllum tabernaklinum: einans teir skulu ikki koma nær reiðskapum halgidómsins og altarinum, at hvørki teir, ella tit eisini, doyggi.

4 Og teir skulu verða sameintir at tær, og halda álegging samkomu-tabernakkulsins, fyri alla tænastu tabernakkulsins: og ein fremmandur skal ikki koma nær at tykkum.

5 Og tit skulu halda álegging halgidómsins, og álegging altarsins: at tað veri eingin vreiði meira uppiá børnum Ísraels.

6 Og eg, sí, eg havi tikið brøður tykkara, Levitarnar, burturúr Ísraels børnum: til tykkara *teir eru* givnir *sum* ein gáva til HARRANS, at gera tænastu savnaðar-tabernakkulsins.

7 Tí skulu tú og tínir synir við tær varða *um* tykkara prests-embæti fyri øll ting altarsins, og innanfyri forhangið; og tit skulu tæna: eg havi givið tykkara prests-embæti *at tykkum sum* eina tænastugávu: og hin fremmandi, sum kemur í nánd, skal verða tikin av lívi.

8 ¶ Og HARRIN talaði við Aaron, Sí, eg eisini havi givið tær álegg-

ingina av mínum hevjiofrum av øllum hinum halgaðu tingum Ísraels barna; innat tær havi eg givið teir við orsøk av salvingini, og til sona tína, viðˆ eini regluskipan um ævir.

9 Hetta skal vera títt av teimum mest heilagu tingunum, *lagt burturav* frá eldinum: hvørt tilbiðjanar-offur hjá teimum, hvørt matoffur hjá teimum, og hvørt syndoffur hjá teimum, og hvørt misgerðaroffur hjá teimum, sum teir skulu veita mær, *skal vera* mest heilagt hjá tær og hjá sonum tínum.

10 Í tí mest heilaga *plássinum* skalt tú eta tað; hvør hannur skal eta tað: tað skal vera tær heilagt.

11 Og hetta *er* títt; hevjiofrið av gávu teirra, við øllum reiggiofrum Ísraels barna: eg havi givið tey at tær, og til sona tína og til døtra tína hjá tær, viðˆ eini áseting um ævir: hvør tann, sum er reinur í húsi tínum, skal eta av tí.

12 Alt tað besta av oljuni, og alt tað besta av víninum, og av hveitinum, frumávøkstirnar av teimum sum teir skulu ofra at HARRANUM, teir havi eg givið tær.

13 *Og* hvatsumhelst *ið* er fyrst staðið í landinum, sum teir skulu føra at HARRANUM, skal vera títt; hvør tann, sum er reinur í húsi tínum, skal eta *av* tí.

14 Hvørt ting, tilvígt í Ísrael, skal vera títt.

15 Hvørt ting sum opnar móðurlívið í øllum kjøti, sum teir føra at HARRANUM, *hvørt tað veri seg* av monnum ella djórum, skal vera títt: hóast hetta, hin frumborna hjá manni skalt tú vissuliga endurloysa, og frumavkomið hjá óreinum djórum skalt tú endurloysa.

16 Og teir, sum eiga at verða endurloystir frá einum mánaða gomlum, skalt tú endurloysa, samsvarandi við tína meting, fyri peningin á fimm sjē´-kl-ar, eftir sjē´-kl-inum hjá halgidóminum, sum *er* tjúgu gē´-râh-ir.

17 Men frumavkomið hjá eini kúgv, ella frumavkomið hjá einum seyði, ella frumavkomið hjá eini geit, skalt tú ikki endurloysa; tey *eru* heilag: tú skalt sletta teirra blóð uppá altarið, og skalt brenna teirra feitt *til* eitt offur gjørt viðˆ eldi, til ein søtan anga at HARRANUM.

18 Og kjøtið av teimum skal vera títt, eins og reiggibringan og eins og hin høgri bógvurin eru tíni.

19 Øll hevjiofrini av teimum heilagu tingunum, sum Ísraels børn ofra at HARRANUM, havi eg givið tær, og sonum tínum og døtrum tínum við tær, viðˆ eini áseting um ævir: tað *er* ein sáttmáli av salti um ævir frammi fyri HARRANUM at tær og til sáð títt hjá tær.

20 ¶ Og HARRIN talaði við Aaron, Tú skalt ongan arv hava í landi teirra, eiheldur skalt tú hava nakran part teirra millum: eg *eri* tín partur og tín arvur millum Ísraels barna.

21 Og sí, eg havi givið børnum Levis allan tíggjundar*part*in í Ísrael til ein arv, fyri teirra tænastu sum teir tæna, *enntá* tænastu samkomu-tabernakkulsins.

22 Eiheldur mugu Ísraels børn hiðanífrá koma nær samkomu-tabernaklinum, at ikki teir beri synd, og doyggi.

23 Men Levitarnir skulu gera tænastu samkomu-tabernakkulsins, og teir skulu bera sína misgerð: *tað skal vera* ein áseting um ævir út gjøgnum ættir tykkara, at millum Ísraels barna hava teir ongan arv.

24 Men tíggjundir Ísraels barna, sum teir ofra *sum* eitt hevjioffur

at HARRANUM, havi eg givið til Levitanna at arva: tí havi eg sagt við teir, millum Ísraels barna skulu teir ongan arv hava.

25 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

26 Svá tala við Levitarnar, og sig við teir, Tá ið tit taka av Ísraels børnum tíggjundirnar, sum eg havi givið tykkum frá teimum til arv tykkara, tá skulu tit ofra upp eitt hevjioffur av tí til HARRANS, *enntá* ein tíggjundar*part* av tíggjundini.

27 Og *hetta* hevjioffur tykkara skal verða roknað tykkum, sum um *tað var* korn treskigólvsins, og sum fylling vínpersunnar.

28 Svá skulu tit eisini ofra eitt hevjioffur at HARRANUM av øllum tykkara tíggjundum, sum tit fáa av Ísraels børnum; og tit skulu geva av tí hevjioffur HARRANS til Aarons prests.

29 Burturav øllum tykkara gávum skulu tit ofra hvørt hevjioffur HARRANS, av øllum tí besta harav, *enntá* hin halgaða partin harav burturav tí.

30 Tí skalt tú siga við teir, Tá ið tit hava hevjað tað besta harav frá tí, tá skal tað verða roknað Levitunum sum grøðin av treskigólvinum, og sum grøðin av vínpersuni.

31 Og tit skulu eta tað í hvørjum plássi, tit og húshøld tykkara: tí at tað *er* tykkara endurgjald fyri tykkara tænastu í samkomu-tabernaklinum.

32 Og tit skulu onga synd bera uppá grund av tí, tá ið tit hava hevjað frá tí tað besta av tí: eiheldur skulu tit óreinka hini heilagu ting Ísraels barna, at ikki tit doyggi.

KAPITUL 19

OG HARRIN talaði við Móses og við Aaron, sigandi,

2 Hetta *er* regluskipan lógarinnar sum HARRIN hevur áboðið, sigandi, Tala við Ísraels børn, at teir føri tær eina reyða kvígu uttan blett, hvarí *er* einkið lýti, *og* uppá hvørja aldri kom ok:

3 Og tit skulu geva hana at Ĕl-ĕ-ā´-zâr-i presti, at hann má føra hana fram útum leirin, og *ēin* skal vega hana frammi fyri andliti hansara:

4 Og Ĕl-ĕ-ā´-zâr prestur skal taka av hennara blóði við sínum fingri, og sletta av hennara blóði beinleiðis framfyri samkomu-tabernaklið sjey ferðir:

5 Og *ēin* skal brenna kvíguna í eygsjón hansara; hennara húð, og hennara kjøt, og hennara blóð, við hennara gori, skal hann brenna:

6 Og presturin skal taka sedrisvið, og ýsop, og skarlak, og kasta *tað* inn í miðjuna av brennuni av kvíguni.

7 So skal presturin tváa klæðir síni, og hann skal baða kjøt sítt í vatni, og síðan skal hann koma inn í leirin, og presturin skal vera óreinur inntil kvøldið.

8 Og hann, sum brennur hana, skal tváa klæðir síni í vatni, og baða kjøt sítt í vatni, og skal vera óreinur inntil kvøldið.

9 Og ein maður, *sum er* reinur, skal savna upp øskurnar av kvíguni, og leggja *tær* niðurfyri uttanfyri leirin í eitt reint pláss, og tað skal verða goymt til samkomu Ísraels barna til eitt vatn av atskilnaði: tað *er* ein skírgan fyri synd.

10 Og hann, sum savnar øskurnar av kvíguni, skal tváa klæðir síni, og vera óreinur inntil kvøldið: og tað skal vera Ísraels børnum, og tí fremmanda sum útisitur teirra millum, til eina áseting um ævir.

11 ¶ Hann, sum nemur við tað deyða likamið av nøkrum manni, skal vera óreinur sjey dagar.

12 Hann skal skírga seg sjálvan við tí á tí triðja deginum, og á tí sjeynda deginum skal hann vera reinur: men um hann skírgi ikki seg sjálvan hin triðja dagin, tá hin sjeynda dagin skal hann ei vera reinur.

13 Hvørsumhelst *ið* nemur við tað deyða likamið av nøkrum manni sum er deyður, og skírgar ikki seg sjálvan, dálkar tabernakkul HARRANS; og handa sál skal verða skorin av frá Ísrael: av tí at vatnið av atskilnaði varð ikki áslett uppá hann, skal hann vera óreinur; hans óreinska *er* enn uppiá honum.

14 Hetta *er* lógin, tá ið ein maður doyr í einum tjaldi: allir sum koma inn í tjaldið, og alt sum *er* í tjaldinum, skal vera óreint sjey dagar.

15 Og hvørt opið ílat, sum onga dekking hevur bundna uppiá tí, *er* óreint.

16 Og hvørsumhelst *ið* nemur við ēin sum er vigin við einum svørði í teimum opnu akrunum, ella eitt deytt likam, ella eitt bein av einum manni, ella eina grøv, skal vera óreinur sjey dagar.

17 Og fyri ein óreinan *persón* skulu teir taka av øskunum av hini brendu reinsanar-kvígu fyri synd, og rennandi vatn skal verða sett hartil í eitt ílat:

18 Og ein reinur persónur skal taka ýsop, og dyppa *hann* í vatnið, og sletta *tað* uppá tjaldið, og uppá øll íløtini, og uppá persónarnar sum vóru har, og uppá hann sum nam við eitt bein, ella ēin vignan, ella ēin deyðan, ella eina grøv:

19 Og hin reini *persónurin* skal sletta uppá hin óreina á tí triðja deginum, og á tí sjeynda deginum: og á tí sjeynda deginum skal hann skírga seg, og tváa klæðir síni, og baða sær í vatni, og skal vera reinur um aftan.

20 Men tann maðurin sum skal vera óreinur, og skal ikki skírga seg, handa sál skal verða skorin av burturúr samkomuni, av tí at hann hevur dálkað halgidóm HARRANS: vatnið av atskilnaði hevur ikki verðið slett uppá hann; hann *er* óreinur.

21 Og tað skal vera teimum ein viðvarandi áseting, at hann, sum slettir vatnið av atskilnaði, skal tváa klæðir síni; og hann, sum nemur við vatnið av atskilnaði, skal vera óreinur inntil aftan.

22 Og hvatsumhelst *ið* hin óreini *persónurin* nemur við, skal vera óreint; og tann sál, sum nemur við *tað,* skal vera órein inntil aftan.

KAPITUL 20

TÁ komu Ísraels børn, *enntá* allur savnaðurin, inn í Zins oyðimørk í tí fyrsta mánaðinum: og fólkið varð *verandi* í Ká´dēsj; og Mirjam doyði har, og varð jarðað har.

2 Og tað var einkið vatn til samkomuna: og teir savnaðu seg saman ímóti Mósesi og ímóti Aaroni.

3 Og fólkið skeldaði við Móses, og talaði, sigandi, Gævi Guð at vit høvdu doyð, tá ið brøður okkara doyðu frammi fyri HARRANUM!

4 Og hví hava tit ført upp samkomu HARRANS inn í hesa oyðuna, at vit og okkara fenaður skuldu doyggja har?

5 Og hvørsvegna hava tit fingið okkum at koma upp úr Egyptalandi, til at føra okkum inn at hesum ónda plássi? tað *er* einkið pláss av sáð*korni*, ella av fikum, ella av víntrøum, ella av granateplum; eiheldur *er* nakað vatn at drekka.

6 Og Móses og Aaron fóru frá nærveruni av savnaðinum at dyrnum á samkomu-tabernaklinum, og teir fullu uppá andlit síni: og dýrd HARRANS birtist at teimum.

7 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
8 Tak stavin, og savna tú savnaðin saman, tú, og Aaron bróðir tín, og talið tit við klettin frammi fyri eygum teirra; og hann skal geva fram vatn sítt, og tú skalt føra fram til teirra vatn út úr klettinum: soleiðis skalt tú geva samkomuni og djórum teirra *at* drekka.
9 Og Móses tók stavin frammi fyri HARRANUM ifrá, eins og hann ábjóðaði honum.
10 Og Móses og Aaron savnaðu samkomuna saman frammanfyri klettin, og hann segði við teir, Hoyrið nú, tit uppreistrar*menn;* mugu vit heinta tykkum vatn úr hesum klettinum?
11 Og Móses lyfti upp hond sína, og við sínum stavi sló hann klettin tværreisur: og vatnið kom út ríkiliga, og samkoman drakk, og teirra djór*ˊ eisini*.
12 ¶ Og HARRIN talaði við Móses og Aaron, Av tí at tit trúðu mær ikki, til at halga meg í eygum Ísraels barna, tí skulu tit ikki føra hesa samkomu inn í landið sum eg havi givið teimum.
13 Hetta *er* Mêrˊîbâh vatnið; av tí at Ísraels børn trættu við HARRAN, og hann varð halgaður í teimum.
14 ¶ Og Móses sendi boðberar frá Káˊdèsj at kongi Ēˊdóm-s, Svá sigur bróðir tín Ísrael, Tú veitst alt strevið sum hevur viðurfarið okkum:
15 Hvussu okkara fedrar fóru niður í Egyptaland, og vit hava dvalst í Egyptalandi eina langa tíð; og Egyptarnir nívdu okkum, og fedrar várar:
16 Og tá ið vit róptu á HARRAN, hoyrdi hann vára rødd, og sendi ein eingil, og hevur ført okkum fram út úr Egyptalandi: og sí, vit *eru* í Káˊdèsj, ein staður í tí uttasta av landamarki tínum:
17 Lat okkum fara, eg biði teg, ígjøgnum land títt: vit vilja ikki fara ígjøgnum akrarnar, ella ígjøgnum víngarðarnar, eiheldur vilja vit drekka *av* vatninum úr brunnunum: vit vilja fara eftir *høvuðs*vegi kongs, vit vilja ikki venda til hinnar høgru handar ella til hinnar vinstru, inntil vit eru farnir framvið landamørkum tínum.
18 Og Ēˊdóm segði við hann, Tú skalt ikki fara framvið mær, at ikki eg komi út ímóti tær við svørðinum.
19 Og Ísraels børn søgdu við hann, Vit vilja fara eftir høvuðsveginum: og um eg og mín fenaður drekki av vatni tínum, tá vil eg gjalda fyri tað: eg vil einans, uttan *at gera* nakað *annað,* fara ígjøgnum á fótum mínum.
20 Og hann segði, Tú skalt ikki fara ígjøgnum. Og Ēˊdóm kom út ímóti honum við nógvum fólki, og við sterkari hond.
21 Svá sýtti Ēˊdóm at geva Ísrael gjøgnumgongd ígjøgnum landamark sítt: hvørsvegna Ísrael vendi burtur frá honum.
22 ¶ Og Ísraels børn, *enntá* øll samkoman, ferðaðist frá Káˊdèsj, og kom at Hór fjalli.
23 Og HARRIN talaði við Móses og Aaron á Hór fjalli, við bredda Ēˊdóm-s lands, sigandi,
24 Aaron skal verða savnaður at fólki sínum: tí at hann skal ikki innfara inn í landið sum eg havi givið børnum Ísraels, av tí at tit gjørdu uppreist ímóti mínum orði við Mêrˊîbâh vatn.
25 Tak Aaron og Ēl-ē-āˊ-zâr, son hansara, og før teir niðan á Hór fjall:
26 Og avklæð Aaron fyri hansara klæðir, og koyr tey uppá Ēl-ē-āˊ-zâr, son hansara: og Aaron skal verða savnaður *at fólki sínum,* og skal doyggja har.
27 Og Móses gjørdi eins og HARRIN ábjóðaði: og teir fóru

niðan á Hór fjall í eygsjónini á allari samkomuni.

28 Og Móses avklæddi Aaron fyri hansara klæðir, og koyrdi tey uppá Ĕl-ĕ-ā´-zâr, son hansara; og Aaron doyði har á toppinum av fjallinum: og Móses og Ĕl-ĕ-ā´-zâr komu oman frá fjallinum.

29 Og tá ið øll samkoman sá at Aaron var deyður, syrgdu tey yvir Aaron tríati dagar, *enntá* alt hús Ísraels.

KAPITUL 21

OG *tá ið* Ár´-ăd kongur Cānaaniti, sum dvaldist í sunnan, hoyrdi sagt at Ísrael kom eftir vegi njósnaranna; tá bardist hann ímóti Ísrael, og tók *summar* av teimum *til* fangar.

2 Og Ísrael strongdi eitt heiti at HARRANUM, og segði, Um tú vilt veruliga flýggja hetta fólk inn í hond mína, tá vil eg fullkomiliga oyða teirra staðir.

3 Og HARRIN gav gætur eftir rødd Ísraels, og flýggjaði upp Cānaanitarnar; og teir fullkomiliga oyddu teir og teirra staðir: og hann kallaði navnið á plássinum Hōr´-măh.

4 ¶ Og teir ferðaðust frá Hór fjalli eftir vegi Reyða-havsins, til at kringfara land Ē´-dóm-s: og sálin hjá fólkinum var mikið mótfallin uppá grund av veginum.

5 Og fólkið talaði ímóti Guði, og ímóti Mósesi, Hvørsvegna hava tit ført okkum upp úr Egyptalandi at doyggja í oyðuni? tí at *tað er* einkið breyð, eiheldur *er nakað* vatn; og sál vári stendst við hetta lætta breyð.

6 Og HARRIN sendi eldsligar høggormar millum fólksins, og teir bitu fólkið; og nógv fólk av Ísrael doyði.

7 ¶ Tí kom fólkið til Móse, og segði, Vit hava syndað, tí at vit hava talað ímóti HARRANUM, og ímóti tær; bið at HARRANUM, at hann taki burt høggormarnar frá okkum. Og Móses bað fyri fólkinum.

8 Og HARRIN segði við Móses, Ger tær ein eldsligan høggorm, og koyr hann uppá eina stong: og tað skal bera á, at hvør tann sum er bitin, tá ið hann hyggur uppá hann, skal liva.

9 Og Móses gjørdi ein høggorm av messing, og koyrdi hann uppá eina stong, og tað bar á, at um ein høggormur hevði bitið nakran mann, tá ið hann skoðaði høggormin av messing, hann livdi.

10 ¶ Og Ísraels børn løgdu avstað, og slógu upp í Ō´-bōth.

11 Og teir ferðaðust frá Ō´-bōth, og slógu upp í Ĭ´-jĕ-ăb´-ă-rĭm, í oyðuni sum *er* frammanfyri Móab, ímóti sólarrisinum.

12 ¶ Haðani frá burtfluttu teir, og slógu upp í Zăr´-ĕd-s dalinum.

13 Haðani frá burtfluttu teir, og slógu upp hīnumegin Arnon, sum *er* í oyðuni, sum kemur út úr breddum Amoritanna: tí at Arnon *er* landamark Móabs, ímillum Móab og Amoritarnar.

14 Hvørsvegna tað verður sagt í bókini um kríggini hjá HARRANUM, Hvat hann gjørdi í Reyðahavinum, og í áarløkum Arnons,

15 Og við streym áarløkanna, sum gongur niður til bústað Ars, og liggur uppiá marki Móabs.

16 Og haðani frá *fóru teir* til Bēēr: tað *er* brunnurin, hvarum HARRIN talaði við Móses, Savna fólkið saman, og eg vil geva teim vatn.

17 ¶ Tá sang Ísrael henda sang, Vell upp, O brunnur; syngið tit honum:

18 Prinsarnir gróvu brunnin, og aðalsmenninir av fólkinum gróvu hann, eftir *vegleiðing* lóggevarans, við sínum stavum. Og frá oyðuni *fóru teir* til Măt-tā´-năh:

19 Og frá Măt-tā´-năh til Nă-hăl´-ĭ-ĕl: og frá Nă-hăl´-ĭ-ĕl til Bá´-mōth:

20 Og frá Bá´-mōth *í* dalinum, tað *er* í landi Móabs, til toppin av Pīs´-găh, sum horvir ímóti Jē´-sjï-mōn.

21 ¶ Og Ísrael sendi boðberar til Sī´-hŏn-s kongs Amoritanna, sigandi,

22 Lat meg fara ígjøgnum land títt: vit vilja ikki venda inn í akrarnar, ella inn í víngarðarnar; vit vilja ikki drekka *av* vøtnunum úr brunninum: *men* vit vilja fara fram eftir *alfara*vegi kongs, inntil vit verði *farnir* framvið landamørkum tínum.

23 Og Sī´-hŏn vildi ikki loyva Ísrael at fara ígjøgnum landamark sítt: men Sī´-hŏn savnaði alt fólk sítt saman, og fór út ímóti Ísrael inn í oyðuna: og hann kom til Já´-hăz, og bardist ímóti Ísrael.

24 Og Ísrael sló hann við svørðseggini, og *tók* til ognar land hansara frá Arnon at Jăb´-bŏk, alt at Ammons børnum: tí at mark Ammons barna *var* sterkt.

25 Og Ísrael tók allar hesar staðir: og Ísrael dvaldist í øllum staðum Amoritanna, í Hĕsj´-bŏn, og í øllum bygdum tess.

26 Tí at Hĕsj´-bŏn *var* staður Sī´-hŏn-s kongs Amoritanna, sum hevði barst ímóti tí undanfarna konginum av Móab, og tikið alt hansara land út úr hond hansara, alt at Arnon.

27 Hvørsvegna teir, sum tala í orðtøkum, siga, Kom inn í Hĕsj´-bŏn, lat stað Sī´-hŏn-s verða bygdan og fyribúnan:

28 Tí at tað er ein eldur farin út úr Hĕsj´-bŏn, ein logi frá staði Sī´-hŏn-s: hann hevur upptært Âr hjá Móab, *og* harrarnar av hinum høgu plássum Arnons.

29 Vei til tín, Móab! tað er úti við tær, O fólk av Chĕ´-mōsj: hann hevur givið sínar synir sum komust undan, og sínar døtur, inn í fangaskap at Sī´-hŏn-i kongi Amoritanna.

30 Vit hava skotið eftir teimum; Hĕsj´-bŏn er týnt alt at Dī´-bŏn, og vit hava lagt teir *í* oyði alt at Nō´-phăh, sum *røkkur* at Mē´-dĕ-bă.

31 ¶ Soleiðis dvaldist Ísrael í landi Amoritanna.

32 Og Móses sendi til at njósna út Jâ-ā´-zĕr, og teir tóku bygdirnar harav, og róku út Amoritarnar sum *vóru* har.

33 ¶ Og teir vendu og fóru niðan eftir vegi Bá´-sjăn-s: og Ōg, kongur Bá´-sjăn-s, fór út ímóti teimum, hann, og alt hansara fólk, til orrustu Ĕd´-rē-ī-s.

34 Og HARRIN segði við Móses, Óttast hann ikki: tí at eg havi flýggjað hann inn í hond tína, og alt hansara fólk, og hansara land; og tú skalt gera við hann eins og tú gjørdirt við Sī´-hŏn kong Amoritanna, sum dvaldist í Hĕsj´-bŏn.

35 So teir slógu hann, og synir hansara, og alt fólk hansara, inntil tað var eingin eftirlatin honum livandi: og teir *tóku* land hansara til ognar.

KAPITUL 22

OG Ísraels børn løgdu avstað, og slógu upp á slættum Móabs hesumegin Jordan *við* Jericho.

2 ¶ Og Bálak Zĭp´-pôr-s sonur sá alt sum Ísrael hevði gjørt við Amoritarnar.

3 Og Móab var sára ræddur fyri fólkinum, av tí at teir *vóru* mangir: og Móab var neyðstaddur uppá grund av børnum Ísraels.

4 Og Móab segði við hinar elstu av Mī´-dī-ăn, Nú skal hesin flokkurin sleikja upp allar *sum eru* rundan um okkum, eins og oksin sleikir upp gras akursins. Og Bálak Zĭp´-pôr-s sonur *var* kongur hjá Móabitunum á teirri tíð.

5 Hann sendi boðberar tessvegna at Bá´-lāăm-i Bē´-ōr-s syni til Pē´-thōr, sum *er* við ánna hjá landi barna fólks hansara, at kalla hann,

sigandi, Sí, tað er eitt fólk komið út frá Egyptalandi: sí, teir dekka ásjón jarðarinnar, og teir steðga yvir av mær:
6 Kom nú tessvegna, eg biði teg, banna mær hetta fólkið; tí at teir *eru* ov mektigir hjá mær: vera má, *at* eg skal hava yvirvág, *at* vit mega slá teir, og *at* eg má reka teir út úr landinum: tí at eg veit, at hann, hvønn tú vælsignart, *er* vælsignaður; og hann, hvønn tú bannart, er bannaður.
7 Og teir elstu av Móab og teir elstu av Mī´-dī-ăn fóru avstað við spásagnar-endurgjøldunum í síni hond; og teir komu at Bá´-lāăm-i, og talaðu við hann orðini hjá Bálaki.
8 Og hann segði við teir, Haldið til her hesa nátt, og eg vil bera tykkum orð aftur, eins og HARRIN skal tala við meg: og prinsarnir av Móab dvaldu hjá Bá´-lāăm-i.
9 Og Guð kom at Bá´-lāăm-i, og segði, Hvørjir menn *eru* hesir *sum eru* hjá tær?
10 Og Bá´-lāăm segði við Guð, Bálak Zĭp´-pôr-s sonur, kongur av Móab, hevur sent til mín, *sigandi,*
11 Sí, *tað er* eitt fólk komið út úr Egyptalandi, sum dekkar ásjón jarðarinnar: kom nú, banna mær teir; vera má, *at* eg skal vera førur fyri at yvirvinna teir, og reka teir út.
12 Og Guð segði við Bá´-lāăm, Tú skalt ikki fara við teimum; tú skalt ikki banna fólkið: tí at teir *eru* vælsignaðir.
13 Og Bá´-lāăm reis upp um morgunin, og segði við prinsarnar hjá Bálaki, Sleppið tykkum inn í land tykkara: tí at HARRIN noktar at geva mær loyvi at fara við tykkum.
14 Og prinsarnir av Móab risu upp, og teir fóru til Bálaks, og søgdu, Bá´-lāăm noktar at koma við okkum.
15 ¶ Og Bálak sendi uppaftur prinsar, fleiri, og meiri heiðursamir enn teir.
16 Og teir komu til Bá´-lāăm-s, og søgdu til hansara, Svá sigur Bálak Zĭp´-pôr-s sonur, Lat einkið, eg biði teg, forða tær frá at koma at mær:
17 Tí at eg vil framflyta teg til sera miklan heiður, og eg vil gera hvatsumhelst tú sigurt við meg: kom tí, eg biði teg, banna mær hetta fólkið.
18 Og Bá´-lāăm svaraði og segði við tænarar Bálaks, Um Bálak vildi givið mær hús sítt fult av silvuri og gulli, kann eg ikki fara framum orð HARRANS Guðs míns, at gera minni ella meira.
19 Nú tessvegna, eg biði tykkum, Steðgið tit eisini her hesa nátt, at eg má vita hvat HARRIN vil siga við meg meira.
20 Og Guð kom at Bá´-lāăm-i um nátt*ina,* og segði við hann, Um menninir komi at rópa teg, rís upp, *og* far við teimum, men tó orðið sum eg skal siga við teg, tað skalt tú gera.
21 Og Bá´-lāăm reis upp um morgunin, og saðlaði sín asna, og fór við prinsunum av Móab.
22 ¶ Og Guðs firtni varð birt, av tí at hann fór: og eingil HARRANS stóð í veginum til ein mótstandara ímóti honum. Nú, hann reið uppiá sínum asna, og hansara tveir tænarar *vóru* við honum.
23 Og asnin sá eingil HARRANS standandi í veginum, og hansara svørð drigið í hond hansara: og asnin snúði til viks út av veginum, og fór inn í akurin: og Bá´-lāăm sló asnan, til at venda honum inn á vegin.
24 Men eingil HARRANS stóð í eini gøtu av víngørðunum, ein veggur *verandi* hesumegin, og ein veggur hasumegin.
25 Og tá ið asnin sá eingil

HARRANS, stoytti hann seg sjálvan at vegginum, og kroysti Bá´-lāām-s fót ímóti vegginum: og hann sló hann aftur.

26 Og eingil HARRANS fór longur, og stóð í einum mjáum plássi, har eingin vegur *var* til at venda hvørki til hinnar høgru handar ella til hinnar vinstru.

27 Og tá ið asnin sá eingil HARRANS, fell hann niður undir Bá´-lāām-i: og Bá´-lāām-s firtni vard kynd, og hann sló asnan við einum stavi.

28 Og HARRIN opnaði munnin á asnanum, og hann segði við Bá´-lāām, Hvat havi eg gjørt tær, at tú hevurt sligið meg hesar tríggjar ferðirnar?

29 Og Bá´-lāām segði við asnan, Av tí at tú hevurt háðað meg: eg vildi tað var eitt svørð í míni hond, tí at nú vildi eg dripið teg.

30 Og asnin segði við Bá´-lāām, *Eri* ikki eg tín asni, uppiá hvørjum tú hevurt riðið heilt síðan *eg varð* tín at hesum degi? var eg nakrantíð vanur at gera soleiðis at tær? Og hann segði, Nei.

31 Tá opnaði HARRIN eyguni á Bá´-lāām-i, og hann sá eingil HARRANS standandi í veginum, og hansara svørð drigið í hond hansara: og hann boygdi niður høvur sítt, og fell flatur á andlit sítt.

32 Og eingil HARRANS segði við hann, Hvørsvegna hevurt tú sligið tín asna hesar tríggjar ferðirnar? sí, eg fór út at mótstanda tær, av tí at *tín* vegur er spiltur frammi fyri mær:

33 Og asnin sá meg, og vendi frá mær hesar tríggjar ferðirnar: uttan hann hevði vent frá mær, vissuliga nú eisini hevði eg vigið teg, og frelst hann á lívi.

34 Og Bá´-lāām segði við eingil HARRANS, Eg havi syndað; tí at eg vitsti ikki at tú stóðst í veginum ímóti mær: nú tessvegna, um tað mistokni tær, vil eg sleppa mær tilbakar aftur.

35 Og eingil HARRANS segði við Bá´-lāām, Far við monnunum: men bara tað orðið sum eg skal tala við teg, tað skalt tú tala. So Bá´-lāām fór við prinsum Bálaks.

36 ¶ Og tá ið Bálak hoyrdi, at Bá´-lāām var komin, fór hann út at møta honum at einum staði av Móab, sum *er* á marki Arnons, sum *er* í tí ytsta breddanum.

37 Og Bálak segði við Bá´-lāām, Sendi eg ikki inntreingjandi at tær til at kalla teg? hvørsvegna komst tú ikki at mær? eri eg ikki førur fyri víst at framflyta teg til heiðurs?

38 Og Bá´-lāām segði við Bálak, Sí, eg eri komin at tær: havi eg nú nakran mátt yvirhøvur til at siga nakað? tað orðið sum Guð leggur í mín munn, tað skal eg tala.

39 Og Bá´-lāām fór við Bálaki, og teir komu at Kĭr´-jăth-hŭ´-zōth.

40 Og Bálak ofraði oksar og seyð, og sendi til Bá´-lāām-s, og til prinsanna sum við honum *vóru*.

41 Og tað bar á um morgindagin, at Bálak tók Bá´-lāām, og førdi hann niðan á hini høgu støð Bă´-ăl-s, at haðani hann mátti sjá hin ytsta *partin* av fólkinum.

KAPITUL 23

OG Bá´-lāām segði við Bálak, Bygg mær her sjey altar, og fyribúgv mær her sjey oksar og sjey veðrar.

2 Og Bálak gjørdi eins og Bá´-lāām hevði talað; og Bálak og Bá´-lāām ofraðu á *hvørjum* altari ein ungtarv og ein veðr.

3 Og Bá´-lāām segði við Bálak, Statt hjá brenniofri tínum, og eg vil fara: vera má, *at* HARRIN vil koma at hitta meg: og hvatsumhelst *ið* hann sýnir mær, vil eg siga tær. Og hann fór til eitt høgt pláss.

4 Og Guð møtti Bá′-lāām-i: og hann segði við hann, Eg havi fyribúgvið sjey altar, og eg havi ofrað uppiá *hvørjum* altari ein ungtarv og ein veðr.

5 Og HARRIN legði eitt orð í munn Bá′-lāām-s, og segði, Vend aftur at Bálaki, og svá skalt tú tala.

6 Og hann vendi aftur at honum, og sí, hann stóð hjá brennisláturofri sínum, hann, og allir prinsar Móabs.

7 Og hann tók upp sína dømisøgu, og segði, Bálak, kongur Móabs, hevur ført meg frá Ár′-ăm, av fjøllum eystursins, *sigandi,* Kom, banna mær Jákob, og kom, trossa Ísrael.

8 Hvussu skal eg banna, hvønn Guð ei hevur bannað? ella hvussu skal eg trossa, *hvønn* HARRIN ei hevur trossað?

9 Tí at frá toppinum av klettunum siggi eg hann, og frá heyggjunum skoði eg hann: sí, fólkið skal dvøljast einsamalt, og skal ei verða roknað tjóðanna millum.

10 Hvør kann telja dust Jákobs, og talið á fjórðings*parti* Ísraels? Lat meg doyggja deyða hinna rættvísu, og lat mín síðsta enda vera líka *sum* hansara!

11 Og Bálak segði við Bá′-lāām, Hvat hevurt tú gjørt mær? Eg tók teg at banna mínar fíggindar, og sí, tú hevurt vælsignað *teir* aldeilis.

12 Og hann svaraði og segði, Má eg ikki geva gætur eftir at tala tað sum HARRIN hevur lagt í mín munn?

13 Og Bálak segði við hann, Kom, eg biði teg, við mær at einum øðrum plássi, hvaðani frá tú kanst sjá teir: tú skalt sjá bert hin ytsta partin av teimum, og skalt ikki sjá teir allar: og banna mær teir haðani frá.

14 ¶ Og hann førdi hann inn í akur Zŏ′-p<u>h</u>ĭm-s, til toppin á Pĭs′-găh, og bygdi sjey altar, og ofraði ein ungtarv og ein veðr á *hvørjum* altari.

15 Og hann segði við Bálak, Statt her hjá brenniofri tínum, meðan eg hitti *HARRAN* haryviri.

16 Og HARRIN hitti Bá′-lāām, og legði eitt orð í hansara munn, og segði, Far aftur at Bálaki, og sig soleiðis.

17 Og tá ið hann kom til hansara, sí, hann stóð hjá brenniofri sínum, og prinsarnir av Móab við honum. Og Bálak segði við hann, Hvat hevur HARRIN talað?

18 Og hann tók upp sína dømisøgu, og segði, Rís upp, Bálak, og hoyr; lýð á meg, tú Zĭp′-pôr-s sonur:

19 Guð *er* ikki ein maður, at hann skuldi logið; eiheldur sonur mans, at hann skuldi iðrast: hevur hann sagt, og skal hann ikki gera *tað?* ella hevur hann talað, og skal hann ikki gera gott *fyri* tað?

20 Sí, eg havi fingið *boð um* at vælsigna: og hann hevur vælsignað; og eg kann ikki venda tí við.

21 Hann hevur ikki skoðað misgerð í Jákobi, eiheldur hevur hann í Ísrael sæð spillusemi: HARRIN Guð hans *er* við honum, og rópið av einum kongi *er* teirra millum.

22 Guð førdi teir út úr Egyptalandi; hann hevur sum var tað styrkina av einum ēinhyrningi.

23 Vissuliga, *tað finst* eingin rúnagandan ímóti Jákobi, eiheldur *finst* nakað spásigarí ímóti Ísrael: samsvarandi við hesa tíðina skal tað verða sagt um Jákob og um Ísrael, Hvat Guð hevur virkað!

24 Sí, fólkið skal rísa upp sum ein mikil leyva, og lyfta upp seg sjálvan sum ein ung leyva: hann skal ei liggja niðri, inntil hann eti *av* bráðini, og drekki blóð hinna vignu.

25 ¶ Og Bálak segði við Bá'lāām, Hvørki banna teir yvirhøvur, ella vælsigna teir yvirhøvur.
26 Men Bá'lāām svaraði og segði við Bálak, Segði ikki eg tær, sigandi, Alt sum HARRIN talar, tað má eg gera?
27 ¶ Og Bálak segði við Bá'lāām, Kom, eg biði teg, eg vil føra teg at einum øðrum plássi; vera má, *at* tað vil tokna Guði, at tú mást banna mær teir haðani frá.
28 Og Bálak førdi Bá'lāām *niðan* á toppin av Pē'ôr, sum horvir ímóti Jē'sjī-mōn.
29 Og Bá'lāām segði við Bálak, Bygg mær her sjey altar, og fyribúgv mær her sjey ungtarvar og sjey veðrar.
30 Og Bálak gjørdi sum Bá'lāām hevði sagt, og ofraði ein ungtarv og ein veðr á *hvørjum* altari.

KAPITUL 24

OG tá ið Bá'lāām sá, at tað toknaði HARRANUM at vælsigna Ísrael, fór hann ikki, sum á øðrum sinnum, at søkja eftir rúnagandanum, men hann setti sítt andlit ímóti oyðuni.
2 Og Bá'lāām lyfti upp eygum sínum, og hann sá Ísrael dvøljandi *í tjøldum sínum* samsvarandi við ættargreinir sínar; og Guðs andi kom uppá hann.
3 Og hann tók upp sína dømisøgu, og segði, Bá'lāām Bē'ōr's sonur hevur sagt, og maðurin, hvørs eygu eru opin, hevur sagt:
4 Hann hevur sagt, sum hoyrdi orðini hjá Guði, sum sá sjón hins Almáttuga, fallandi *inn í eina transu,* men havandi eygu síni opin:
5 Hvør stásilig eru tjøld tíni, O Jákob, *og* tabernakkul tíni, O Ísrael!
6 Sum dalarnir eru tey spreidd út, sum aldingarðar við áarbakkan, eins og trøini av alǒe-trøum, hvørji HARRIN hevur plantað, *og* eins og sedris trø við síðuna av vøtnunum.
7 Hann skal hella vatnið út úr spannum sínum, og hansara sáð *skal vera* í mongum vøtnum, og hansara kongur skal vera hægri enn Ágag, og hans kongadømi skal vera upphevjað.
8 Guð førdi hann fram út úr Egyptalandi; hann hevur sum var tað styrkina hjá einum ēinhyrningi: hann skal eta upp tjóðirnar sínar figgindar, og skal bróta teirra bein, og gata *teir* ígjøgn við sínum ørvum.
9 Hann slangaði *sær,* hann legði *seg* niður sum ein leyva, og sum ein mikil leyva: hvør skal rumska hann upp? Vælsignaður *er* hann sum vælsignar teg, og bannaður *er* hann sum bannar teg.
10 ¶ Og Bálaks firtni varð kynd ímóti Bá'lāām-i, og hann sló sínar hendur saman: og Bálak segði við Bá'lāām, Eg kallaði teg til at banna mínar figgindar, og sí, tú hevurt aldeilis vælsignað *teir* hesar tríggjar ferðirnar.
11 Tessvegna nú, flýggja tú til pláss tíns: eg hugsaði at framflyta teg til mikils heiðurs; men sí, HARRIN hevur hildið tær aftur frá heiðuri.
12 Og Bá'lāām segði við Bálak, Talaði eg ikki eisini til tænara tína, sum tú sendirt at mær, sigandi,
13 Um Bálak vildi givið mær hús sítt fult av silvuri og gulli, kann eg ei fara framum HARRANS ábjóðan, til at gera *hvørki* gott ella ilt av mínum egna sinni; *men* tað *sum* HARRIN sigur, tað vil eg tala?
14 Og nú, sí, eg fari at fólki mínum: kom *tí, og* eg vil lýsa tær hvat hetta fólkið skal gera við fólk títt í teimum seinnu døgunum.

15 ¶ Og hann tók upp sína dømisøgu, og segði, Bá′-lāām Bē′-ōr-s sonur hevur sagt, og maðurin, hvørs eygu eru opin, hevur sagt:
16 Hann hevur sagt, sum hoyrdi orðini hjá Guði, og vitsti kunnskap hins mest Høga, *sum* sá sjón hins Almáttuga, fallandi *inn í eina transu,* men havandi eygu síni opin:
17 Eg skal sjá hann, men ikki nú: eg skal skoða hann, men ikki í nánd: tað skal koma ein Stjørna út úr Jákobi, og ein Veldissproti skal rísa út úr Ísrael, og skal sláa hjørnini hjá Móab, og oyðileggja øll børnini hjá Sjeth.
18 Og Ē′-dóm skal vera ein ogn, Sē′-ír eisini skal vera ein ogn hjá sínum figgindum; og Ísrael skal inna reystliga.
19 Út úr Jákobi skal koma hann sum skal hava harradømi, og skal oyðileggja hann sum er eftir av staðinum.
20 ¶ Og tá ið hann hugdi á Ā′-mâ-lēk, tók hann upp sína dømisøgu, og segði, Ā′-mâ-lēk *var* hin fyrsti av tjóðunum; men hansara seinni endi *skal vera,* at hann glatist um ævir.
21 Og hann hugdi á Kē-nĭt′-arnar, og tók upp sína dømisøgu, og segði, Sterkur er bústaður tín, og tú seturt títt reiður í ein klett.
22 Hóast hetta, Kē-nĭt′-in skal verða oyddur, inntil Āssj′-ūr skal bera teg burtur *til* fanga.
23 Og hann tók upp sína dømisøgu, og segði, Akk, hvør skal liva tá ið Guð ger hetta!
24 Og skip *skulu koma* frá strond Chĭt′-tīm-s, og skulu plága Āssj′-ūr, og skulu plága Ē′-bĕr, og hann eisini skal glatast um ævir.
25 Og Bá′-lāām reis upp, og fór og vendi aftur til pláss síns: og Bálak eisini fór veg sín.

KAPITUL 25

OG Ísrael varð í Sjĭt′-tĭm, og fólkið tók at fremja hordóm við døtrum Móabs.
2 Og teir kallaðu fólkið at sláturofrum guda sína: og fólkið át, og boygdi *seg* niður fyri gudum teirra.
3 Og Ísrael sameinti seg at Bā′-ăl-pē′-ôr-i: og HARRANS firtni varð kynd ímóti Ísrael.
4 Og HARRIN segði við Móses, Tak allar høvuðs*menn*inar av fólkinum, og hang teir upp frammi fyri HARRANUM ímóti sólini, at hin grimma firtni HARRANS má verða vend burtur frá Ísrael.
5 Og Móses segði við dómararnar av Ísrael, Vegið tit hvør *og* ēin sínar menn sum vóru sameintir at Bā′-ăl-pē′-ôr-i.
6 ¶ Og sí, ēin av Ísraels børnum kom og førdi at brøðrum sínum eina Mĭ-dī-ă-nĭt′-iska kvinnu í eygsjón Mósesar, og í eygsjónini á allari samkomu Ísraels barna, sum grótu *frammanfyri* dyrnar á samkomu-tabernaklinum.
7 Og tá ið Phĭ′-nē-hās, sonur Ĕl-ē-ā′-zâr-s, sonar Aarons prests, sá *tað*, reis hann upp samkomunnar millum ífrá, og tók eitt kastispjót í sína hond;
8 Og hann fór aftaná manninum av Ísrael inn í tjaldið, og stoytti bæði av teimum ígjøgn, mannin av Ísrael, og kvinnuna ígjøgn hennara kvið. So plágan varð steðgað frá børnum Ísraels.
9 Og teir, sum doyðu í pláguni, vóru tjúgu og fýra túsund.
10 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
11 Phĭ′-nē-hās, sonur Ĕl-ē-ā′-zâr-s, sonar Aarons prests, hevur vent míni vreiði burtur frá børnum Ísraels, meðan hann var vandlátur fyri mína skyld teirra millum, at eg upptærdi ikki børn Ísraels í míni ástbrelni.

12 Hvørsvegna sig, Sí, eg gevi honum friðarsáttmála mín:
13 Og hann skal hava hann, og hansara sáð eftir hann, *enntá* sáttmálan av einum ævigtvarandi prestadømi; av tí at hann var vandlátur fyri Guð sín, og gjørdi eina sáttargerð fyri børn Ísraels.
14 Nú, navnið hjá Ísraelitanum sum varð vigin, *enntá* sum varð vigin við tí Mī-dī-ă-nĭt′-isku kvinnuni, *var* Zimrī, sonur Sā′-lŭ, ein prinsur av einum høvuðs húsi millum Símeonitanna.
15 Og navnið hjá Mī-dī-ă-nĭt′-isku kvinnuni, sum varð vigin, *var* Cŏz′-bī, dóttir Zūr-s; hann *var* høvuðs*maður* yvir einum fólki, *og* av einum høvuðs húsi í Mī′-dī-ăn.
16 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
17 Nívið Mī-dī-ă-nĭt′-arnar, og vegið teir:
18 Tí at teir níva tykkum við sínum snildarbrøgdum, hvarvið teir hava tølt tykkum í málevni Pĕ′-ôr-s, og í málevni Cŏz′-bī-s, dóttrini at einum prinsi av Mī′-dī-ăn, systur síni, sum varð vigin á plágunnar degi fyri Pĕ′-ôr-s skuld.

KAPITUL 26

OG tað bar á aftaná pláguna, at HARRIN talaði við Móses og við Ĕl-ĕ-ā′-zâr, son Aarons prests, sigandi,
2 Takið samløguna av allari samkomu Ísraels barna, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, út gjøgnum hús faðirs teirra; øllum sum eru førir fyri at fara til kríggj í Ísrael.
3 Og Móses og Ĕl-ĕ-ā′-zâr prestur talaðu við teir á slættum Móabs við Jordan *nær* Jericho, sigandi,
4 *Takið samløguna av fólkinum*, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir; eins og HARRIN bjóðaði Mósesi og børnum Ísraels, sum fóru fram út úr Egyptalandi.
5 ¶ Reûben, elsti sonur Ísraels: børn Reûbens; Há′-nŏch, *av hvørjum kemur* familjan hjá Hă-nŏch-ĭt′-unum: av Păl′-lû, familjan hjá Păl-lû-ĭt′-unum:
6 Av Hĕz′-rŏn, familjan hjá Hĕz-rŏn-ĭt′-unum: av Câr′-mī, familjan hjá Câr-mĭt′-unum.
7 Hesar *eru* familjurnar hjá Reûbenitunum: og teir, sum vórðu upptaldir av teimum, vóru fjøruti og trý túsund og sjey hundrað og tríati.
8 Og synir Păl′-lû; Ē′-lī-ăb.
9 Og synir Ē′-lī-ăb-s; Nĕ′-mŭ-ĕl, og Dā′-thăn, og Á′-bī-răm. Hetta *er tann* Dā′-thăn og Á′-bī-răm, *sum vóru* navngitnir í samkomuni, hvørjir trættu ímóti Mósesi og ímóti Aaroni í flokki Kōr′-ăh, tá ið teir trættu ímóti HARRANUM:
10 Og jørðin opnaði sín munn, og svølgdi teir upp tilsaman við Kōr′-ăh, tá ið hasin flokkurin doyði, hvørja tíð eldurin upptærdi tvey hundrað og fimti menn: og teir gjørdust eitt tekin.
11 Hóast hetta, børn Kōr′-ăh doyðu ikki.
12 ¶ Synir Símeons eftir teirra familjum: av Nĕ′-mŭ-ĕl, familjan hjá Nĕ-mŭ-ĕl-ĭt′-unum: av Já′-mĭn, familjan hjá Já-mĭn-ĭt′-unum: av Já′-chĭn, familjan hjá Já-chĭn-ĭt′-unum:
13 Av Zĕ′-râh, familjan hjá Zâr-hĭt′-unum: av Sjā′-ŭl, familjan hjá Sjā-ŭ-lĭt′-unum.
14 Hesar *eru* familjurnar hjá Símeonitunum, tjúgu og tvey túsund og tvey hundrað.
15 ¶ Gáds børn eftir teirra familjum: av Zĕ′-phŏn, familjan hjá Zê-phŏn-ĭt′-unum: av Hăg′-gī, familjan hjá Hăg-gĭt′-unum: av Sjū′-nī, familjan hjá Sjû-nĭt′-unum:
16 Av Ŏz′-nī, familjan hjá Ŏz-nĭt′-unum: av Ē′-rī, familjan hjá Ê-rĭt′-unum:
17 Av Ár′-ŏd, familjan hjá Ár-ŏ-

dĭt′-unum: av Ă-rē′-lī, familjan hjá Ă-rê-lĭt′-unum.

18 Hesar *eru* familjurnar av Gáds børnum samsvarandi við teir sum vórðu upptaldir av teimum, fjøruti túsund og fimm hundrað.

19 ¶ Synir Judah *vóru* Êr og Ó′-năn: og Êr og Ó′-năn doyðu í landi Cānaans.

20 Og synir Judah eftir teirra familjum vóru; av Sjē′-lâh, familjan hjá Sjê-lă-nĭt′-unum: av Phâr′-ĕz, familjan hjá Phăr-zĭt′-unum: av Zē′-râh, familjan hjá Zâr-hĭt′-unum.

21 Og synir Phâr′-ĕz-ar vóru; av Hēz′-rŏn, familjan hjá Hēz-rŏn-ĭt′-unum: av Hám′-ŭl, familjan hjá Hám-ŭ-lĭt′-unum.

22 Hesar *eru* familjurnar av Judah samsvarandi við teir sum vórðu upptaldir av teimum, trí-sinstjúgu og sekstan túsund og fimm hundrað.

23 ¶ *Av* sonum Ĭs′-să-chăr-s eftir teirra familjum: *av* Tō′-lă, familjan hjá Tō-lă-ĭt′-unum: av Pŭ′-ă, familjan hjá Pû-nĭt′-unum:

24 Av Já′-sjŭb, familjan hjá Já-sjŭ-bĭt′-unum: av Sjĭm′-rŏn, familjan hjá Sjĭm-rŏn-ĭt′-unum.

25 Hesar *eru* familjurnar av Ĭs′-să-chăr, samsvarandi við teir sum vórðu upptaldir av teimum, trísinstjúgu og fýra túsund og trý hundrað.

26 ¶ *Av* sonum Zē′-bŭ-lŏn-s eftir teirra familjum: av Sē′-rĕd, familjan hjá Săr-dĭt′-unum: av Ē′-lŏn, familjan hjá Ê-lŏn-ĭt′-unum: av Jáh′-lēēl, familjan hjá Jáh-lēēl-ĭt′-unum.

27 Hesar *eru* familjurnar av Zê-bŭ-lŏn-ĭt′-unum, samsvarandi við teir sum vórðu upptaldir av teimum, trísinstjúgu túsund og fimm hundrað.

28 ¶ Synir Jóseph-s eftir teirra familjum *vóru* Mă-năs′-sēh og Ē′-phră-ĭm.

29 Av sonum Mă-năs′-sēh: av Má′-chīr, familjan hjá Má-chīr-ĭt′-unum: og Má′-chīr gat Gilead: av Gilead *koma* familjan hjá Gilead-itunum.

30 Hesir *eru* synir Gileads: *av* Jē-ē′-zĕr-i, familjan hjá Jē-ē-zĕr-ĭt′-unum: av Hē′-lĕk, familjan hjá Hê-lĕk-ĭt′-unum:

31 Og *av* Ăs′-rĭ-ĕl, familjan hjá Ăs-rĭ-ĕl-ĭt′-unum: og *av* Sjē′-chĕm, familjan hjá Sjê-chĕm-ĭt′-unum:

32 Og *av* Sjē-mī′-dă, familjan hjá Sjē-mī-dă-ĭt′-unum: og *av* Hē′-phĕr-i, familjan hjá Hê-phĕr-ĭt′-unum.

33 ¶ Og Zê-lōph′-ē-hăd Hē′-phĕr-s sonur hevði ongar synir, men døtur: og nøvnini hjá døtrum Zê-lōph′-ē-hăd-s *vóru* Mâh′-lăh, og Noah, Hōg′-lăh, Mĭl′-câh, og Tĭr′-zăh.

34 Hesar *eru* familjurnar av Mă-năs′-sēh, og teir sum vórðu upptaldir av teimum, fimti og tvey túsund og sjey hundrað.

35 ¶ Hesir *eru* synir Ē′-phră-ĭm-s eftir teirra familjum: av Sjū′-thē-lâh, familjan hjá Sjū-thăl-hĭt′-unum: av Bē′-chĕr-i, familjan hjá Băch-rĭt′-unum: av Tá′-hăn-i, familjan hjá Tá-hăn-ĭt′-unum.

36 Og hesir *eru* synir Sjū′-thē-lâh: av Ē′-răn, familjan hjá Ê-răn-ĭt′-unum.

37 Hesar *eru* familjurnar av sonum Ē′-phră-ĭm-s samsvarandi við teir sum vórðu upptaldir av teimum, tríati og tvey túsund og fimm hundrað. Hesir *eru* synir Jóseph-s eftir teirra familjum.

38 ¶ Synir Benjamins eftir teirra familjum: av Bē′-lă, familjan hjá Bê-lă-ĭt′-unum: av Ăsj′-bĕl, familjan hjá Ăsj-bĕl-ĭt′-unum: av Á′-hĭ-răm, familjan hjá Á-hĭ-răm-ĭt′-unum:

39 Av Sjū′-phăm-i, familjan hjá Sjû-phăm-ĭt′-unum: av Hū′-phăm-i, familjan hjá Hû-phăm-ĭt′-unum.

40 Og synir Bē′-lă vóru Ârd og Ná′-ă-măn: *av Ârd,* familjan hjá

Ârd-ĭt′-unum: *og* av Ná′-ă-măn-i, familjan hjá Ná-ă-mĭt′-unum.

41 Hesir *eru* synir Benjamins eftir teirra familjum: og teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* fjøruti og fimm túsund og seks hundrað.

42 ¶ Hesir *eru* synirnir hjá Dáni eftir teirra familjum: av Sjû′-hâm, familjan hjá Sjû-hâm-ĭt′-unum. Hesar *eru* familjurnar av Dáni eftir teirra familjum.

43 Allar familjurnar av Sjû-hâm-ĭt′-unum, samsvarandi við teir sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* trísinstjúgu og fýra túsund og fýra hundrað.

44 ¶ *Av* børnum Ásjers eftir teirra familjum: av Jĭm′-nă, familjan hjá Jĭm-nĭt′-unum: av Jĕs′-ū-ĭ, familjan hjá Jĕs-ū-ĭt′-unum: av Bē-rĭ′-ăh, familjan hjá Bē-rĭ-ĭt′-unum.

45 Av sonunum hjá Bē-rĭ′-ăh: av Hĕ′-bĕr-i, familjan hjá Hê-bĕr-ĭt′-unum: av Măl′-chĭ-ĕl, familjan hjá Măl-chĭ-ĕl-ĭt′-unum.

46 Og navnið hjá dóttur Ásjers *var* Sárah.

47 Hesar *eru* familjurnar av sonunum hjá Ásjeri samsvarandi við teir sum vórðu upptaldir av teimum; *sum vóru* fimti og trý túsund og fýra hundrað.

48 ¶ *Av* sonum Năph′-tâ-lī-s eftir teirra familjum: av Jáh′-zēel, familjan hjá Jáh-zēel-ĭt′-unum: av Gŭ′-nī, familjan hjá Gŭ-nĭt′-unum:

49 Av Jē′-zĕr, familjan hjá Jēzĕr-ĭt′-unum: av Sjĭl′-lĕm, familjan hjá Sjĭl-lĕm-ĭt′-unum.

50 Hesar *eru* familjurnar av Năph′-tâ-lī samsvarandi við teirra familjur: og teir, sum vórðu upptaldir av teimum, *vóru* fjøruti og fimm túsund og fýra hundrað.

51 Hesir *vóru* hinir upptaldu av børnum Ísraels, seks hundrað túsund og eitt túsund *og* sjey hundrað og tríati.

52 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

53 Innat hesum skal landið verða sundurdeilt til ein arv samsvarandi við talið á nøvnum.

54 Til mangar skalt tú geva tess meiri arv, og til fáar skalt tú geva tess minni arv: til hvønn *og* ein skal arvur hansara verða givin samsvarandi við teir sum vórðu upptaldir hjá honum.

55 Hóast hetta, landið skal verða sundurdeilt viðˆ lut*akasti*: samsvarandi við nøvnini á ættargreinum fedra sína skulu teir arva.

56 Samsvarandi við lut*akasti*ð skal ognin harav verða sundurdeild ímillum mangar og fáar.

57 ¶ Og hesir *eru* teir sum vórðu upptaldir av Levitunum eftir teirra familjum: av Gĕr′-sjŏn, familjan hjá Gĕr-sjŏn-ĭt′-unum: av Kō′-hăth, familjan hjá Kō-hăth-ĭt′-unum: av Mĕ-râr′-ī, familjan hjá Mĕ-râr-ĭt′-unum.

58 Hesar *eru* familjurnar hjá Levitunum: familjan hjá Lĭb-nĭt′-unum, familjan hjá Hê-brŏn-ĭt′-unum, familjan hjá Măh-lĭt′-unum, familjan hjá Mû-sjĭt′-unum, familjan hjá Kōr-ă-thĭt′-unum. Og Kō′-hăth gat Amram.

59 Og navnið hjá ektakonu Amrams *var* Jōch′-ĕ-bĕd, dóttir Levīs, hvørja *móðir hennara* føddi til Levīs í Egyptalandi: og hon føddi Amrami Aaron og Móses, og Mirjam, systur teirra.

60 Og Aaroni varð føddur Nádab, og Ā′-bĭ-hû, Ĕl-ĕ-ā′-zâr, og Ĭth′-ă-mâr.

61 Og Nádab og Ā′-bĭ-hû doyðu, tá ið teir ofraðu fremmandan eld frammi fyri HARRANUM.

62 Og teir, sum vórðu upptaldir av teimum, vóru tjúgu og trý túsund, allir hannar frá einum mánaði gomlum og uppeftir: tí at teir vórðu ikki upptaldir millum Ísraels barna, av tí at tað var eingin arvur givin teimum millum Ísraels barna.

63 ¶ Hesir *eru* teir sum vórðu upptaldir av Mósesi og Ĕl-ĕ-ā´-zâr-i presti, hvørjir upptaldu Ísraels børn á slættum Móabs við Jordan *nær* Jericho.

64 Men millum hesar var tað ikki ein maður av teimum sum Móses og Aaron prestur upptaldu, tá ið teir upptaldu Ísraels børn í Sĭ´-nâi-s oyðu.

65 Tí at HARRIN hevði sagt um teir, Teir skulu vissuliga doyggja í oyðuni. Og tað var ikki eftir ein maður av teimum, uttan Caleb Jē´-phŭn-nĕh sonur, og Josjua Nuns sonur.

KAPITUL 27

TÁ komu døtur Zê-lōph´-ĕ-hăd-s, sonar Hē´-phĕr-s, sonar Gileads, sonar Má´-chīr-s, sonar Mă-năs´-sĕh, av familjunum hjá Mă-năs´-sĕh, syni Jósephs: og hesi *eru* nøvnini hjá døtrum hansara; Mâh´-lăh, Noah, og Hōg´-lăh, og Mĭl´-câh, og Tĭr´-zăh.

2 Og tær stóðu frammi fyri Mósesi, og frammi fyri Ĕl-ĕ-ā´-zâr-i presti, og frammi fyri prinsunum og allari samkomuni, *við* dyrnar á samkomu-tabernaklinum, sigandi,

3 Okkara faðir doyði í oyðuni, og hann var ikki í flokki teirra sum savnaðu seg saman ímóti HARRANUM í flokki Kōr´-ăh; men doyði í síni egnu synd, og hevði ongar synir.

4 Hví skuldi navn faðirs okkara verðið beint burtur burturúr familju hansara, av tí at hann ongan son hevur? Gev okkum *tí* eina ogn millum brøðra faðirs okkara.

5 Og Móses førdi teirra søk framfyri HARRAN.

6 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

7 Døtur Zê-lōph´-ĕ-hăd-s tala rætt: tú skalt vissuliga geva teimum eina ogn av einum arvi millum brøðra faðirs teirra; og tú skalt elva arvi faðirs teirra at fara at teimum.

8 Og tú skalt tala við børn Ísraels, sigandi, Um ein maður doyggi, og ongan son havi, tá skulu tit elva arvi hans at fara at dóttur hans.

9 Og um hann onga dóttur havi, tá skulu tit geva arv hans at brøðrum hans.

10 Og um hann ongar brøður havi, tá skulu tit geva arv hans at brøðrum faðirs hans.

11 Og um hansara faðir ongar brøður havi, tá skulu tit geva arv hans at skyldmanni hansara sum er næstur mót honum av familju hansara, og hann skal ognast tað: og tað skal vera Ísraels børnum ein dómsáseting, eins og HARRIN skipaði Mósesi.

12 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Slepp tær niðan á hetta fjall Áb´-ă-rīm, og síggj landið sum eg havi givið Ísraels børnum.

13 Og tá ið tú hevurt sæð tað, skalt tú eisini verða savnaður at fólki tínum; eins og Aaron tín bróðir varð savnaður.

14 Tí at tit gjørdu uppreist ímóti ábjóðing míni í Zīns oyðimørk, í klandri samkomunnar, *um* at halga meg hjá vatninum frammi fyri eygum teirra: tað *er* Mêr´-î-bâh vatn í Ká´-dĕsj í Zīns oyðu.

15 ¶ Og Móses talaði við HARRAN, sigandi,

16 Lat HARRAN, Guð˜ hjá andunum av øllum kjøti, seta ein mann yvir samkomuni,

17 Sum kann fara út undan teimum, og sum kann fara inn undan teimum, og sum kann leiða teir út, og sum kann føra teir inn; at samkoma HARRANS veri ikki sum seyðir sum ongan hirða hava.

18 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Tak tær Josjua Nuns son, ein

mann í hvørjum andin *er,* og legg tína hond uppá hann;

19 Og set hann framfyri Ĕl-ĕ-ā´-zâr prest, og framfyri alla samkomuna; og gev honum eina álegging í eygsjón teirra.

20 Og tú skalt koyra *nakað* av tíni æru uppá hann, at øll samkoma Ísraels barna má vera lýðin.

21 Og hann skal standa frammi fyri Ĕl-ĕ-ā´-zâr-i presti, sum skal spyrja *um ráð* fyri hann eftir dómi Ū´-rĭm-s frammi fyri HARRANUM: eftir orði hansara skulu teir fara út, og eftir orði hansara skulu teir koma inn, *bæði* hann, og øll børn Ísraels við honum, enntá øll samkoman.

22 Og Móses gjørdi eins og HARRIN beyð honum: og hann tók Josjua, og stillaði hann framfyri Ĕl-ĕ-ā´-zâr prest, og framfyri alla samkomuna:

23 Og hann legði hendur sínar uppá hann, og gav honum eina álegging, eins og HARRIN ábeyð við^ hendi Móse.

KAPITUL 28

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Bjóða børnum Ísraels, og sig við teir, Mítt offur, *og* mítt breyð til míni sláturoffur gjørd við^ eldi, mær *til* ein søtan anga, skulu tit geva gætur eftir at ofra at mær í teirra røttu tíð.

3 Og tú skalt siga við teir, Hetta *er* ofrið gjørt við^ eldi sum tit skulu ofra at HARRANUM; tvey fyrsta árs lomb uttan blett dag um dag, *til* eitt áframhaldandi brennioffur.

4 Tað ēina lambið skalt tú ofra um morgunin, og hītt lambið skalt tú ofra um aftan;

5 Og ein tíggjundar*part* av eini ē´-phŭh av mjøli til eitt matoffur, blandað við fjórðings*part*in av eini hîn av slignari olju.

6 *Tað er* eitt áframhaldandi brennioffur, sum varð fyriskipað á Sĭ´-năĭ fjalli til ein søtan anga, eitt sláturoffur gjørt við^ eldi at HARRANUM.

7 Og drykkofrið harav *skal vera* fjórðings*partur*in av eini hîn fyri tað ēina lambið: í tí heilaga *plássinum* skalt tú elva tí sterka víninum at verða helt HARRANUM *til* eitt drykkoffur.

8 Og hītt lambið skalt tú ofra um aftan: eins og matofrið um morgunin, og eins og drykkofrið harav, skalt tú ofra *tað,* eitt sláturoffur gjørt við^ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM.

9 ¶ Og á sabbatsdeginum tvey fyrsta árs lomb uttan blett, og tveir tíggjunddeilir av mjøli *til* eitt matoffur, blandað við olju, og drykkofrið harav:

10 *Hetta er* brenniofrið hjá hvørjum sabbati, umframt tað áframhaldandi brenniofrið, og drykkoffur hans.

11 ¶ Og í byrjanunum av tykkara mánaðum skulu tit ofra eitt brennioffur at HARRANUM; tveir ungar ungtarvar, og ēin veðr, sjey fyrsta árs lomb uttan blett;

12 Og tríggjar tíggjunddeilir av mjøli *til* eitt matoffur, blandað við olju, fyri ēin ungtarv; og tveir tíggjunddeilir av mjøli *til* eitt matoffur, blandað við olju, fyri ēin veðr;

13 Og ein atskildan tíggjunddeil av mjøli, blandað við olju, *til* eitt matoffur at ēinum lambi; *til* eitt brennioffur av einum søtum anga, eitt sláturoffur gjørt við^ eldi at HARRANUM.

14 Og teirra drykkoffur skulu vera ein hálv hîn av víni at einum ungtarvi, og triðjings*partur*in av eini hîn at einum veðri, og ein fjórðings*partur* av eini hîn at einum lambi: hetta *er* brenniofrið hjá hvørjum mánaði út gjøgnum mánaðirnar av árinum.

15 Og ēitt lamb av geitunum til eitt syndoffur at HARRANUM skal verða ofrað, umframt tað áframhaldandi brenniofrið, og drykkoffur hans.
16 Og í hinum fjúrtanda degi av tí fyrsta mánaðinum *er* umleyp HARRANS.
17 Og í hinum fimtanda degi av hesum mánaði *er* hátíðin: sjey dagar skal ósúrgað breyð verða etið.
18 Í tí fyrsta deginum *skal vera* ein heilag samankalling; tit skulu einkið háttarlag av tænarakendum arbeiði gera *harí:*
19 Men tit skulu ofra eitt sláturoffur gjørt við eldi *til* eitt brennioffur at HARRANUM; tveir ungar ungtarvar, og ēin veðr, og sjey fyrsta árs lomb: tey skulu vera tykkum uttan lýti:
20 Og teirra matoffur *skal vera av* mjøli blandaðum við olju: tríggjar tíggjunddeilir skulu tit ofra fyri ein ungtarv, og tveir tíggjunddeilir fyri ein veðr;
21 Ein atskildan tíggjunddeil skalt tú ofra fyri hvørt lambið, út gjøgnum tey sjey lombini:
22 Og ēina geit *til* eitt syndoffur, til at gera eina sáttargerð fyri tykkum.
23 Tit skulu ofra hesi umframt brenniofrið um morgunin, sum *er* til eitt áframhaldandi brennioffur.
24 Eftir hesum háttarlagi skulu tit ofra dagligani, út gjøgnum teir sjey dagarnar, matin av sláturofrinum gjørdum við eldi, av einum søtum anga at HARRANUM: tað skal verða ofrað umframt tað áframhaldandi brenniofrið, og drykkoffur hans.
25 Og á hinum sjeynda degi skulu tit hava eina heilaga samankalling; tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera.
26 ¶ Eisini á frumávaksta-deginum, tá ið tit koma við einum nýggjum matofri at HARRANUM, eftir *at* tykkara vikur *veri úti*, skulu tit hava eina heilaga samankalling; tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera:
27 Men tit skulu ofra brenniofrið til ein søtan anga at HARRANUM; tveir ungar ungtarvar, ēin veðr, sjey fyrsta árs lomb;
28 Og teirra matoffur av mjøli blandað við olju, tríggjar tíggjunddeilir at ēinum ungtarvi, tveir tíggjunddeilir at ēinum veðri,
29 Ein atskildan tíggjunddeil at ēinum lambi, út gjøgnum tey sjey lombini;
30 *Og* ēitt lamb av geitunum, til at gera eina sáttargerð fyri tykkum.
31 Tit skulu ofra *tey* umframt tað áframhaldandi brenniofrið, og matoffur hans, (tey skulu vera tykkum uttan lýti), og drykkofrini hjá teimum.

KAPITUL 29

OG í tí sjeynda mánaðinum, á hinum fyrsta *degi* mánaðarins, skulu tit hava eina heilaga samankalling; tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera: tað er ein dagur av *at* blása lúðrarnar yvirfyri tykkum.
2 Og tit skulu ofra eitt brennioffur til ein søtan anga at HARRANUM; ēin ungan ungtarv, ēin veðr, *og* sjey fyrsta árs lomb uttan lýti:
3 Og teirra matoffur *skal vera av* mjøli blandaðum við olju, tríggjar tíggjunddeilir fyri ein ungtarv, *og* tveir tíggjunddeilir fyri ein veðr,
4 Og ēin tíggjunddeil fyri ēitt lamb, út gjøgnum tey sjey lombini:
5 Og ēitt lamb av geitunum *til* eitt syndoffur, til at gera eina sáttargerð fyri tykkum:
6 Umframt brennioffur mánaðarins, og matoffur hans, og tað

dagliga brenniofrið, og matoffur hans, og drykkofrini hjá teimum, sambært teirra háttarlagi, til ein søtan anga, eitt sláturoffur gjørt við˚ eldi at HARRANUM.

7 ¶ Og tit skulu hava á hinum tíggjunda *degi* av hesum sjeynda mánaði eina heilaga samankalling; og tit skulu níva tykkara sálir: tit skulu ikki gera nakað arbeiði *harí:*

8 Men tit skulu ofra eitt brennioffur at HARRANUM *til* ein søtan anga; ēin ungan ungtarv, ēin veðr, *og* sjey fyrsta árs lomb; tey skulu vera tykkum uttan lýti:

9 Og teirra matoffur *skal vera av* mjøli blandaðum við olju, tríggjar tíggjunddeilir til ein ungtarv, *og* tveir tíggjunddeilir til ēin veðr,

10 Ein atskildan tíggjunddeil til ēitt lamb, út gjøgnum tey sjey lombini:

11 Ēitt lamb av geitunum *til* eitt syndoffur; umframt sáttargerðarsyndofrið, og tað áframhaldandi brenniofrið, og matofrið hjá tí, og drykkofrini hjá teimum.

12 ¶ Og á tí fimtanda deginum av tí sjeynda mánaðinum skulu tit hava eina heilaga samankalling; tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera, og tit skulu halda eina hátíð at HARRANUM sjey dagar:

13 Og tit skulu ofra eitt brennioffur, eitt sláturoffur gjørt við˚ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM; trettan ungar ungtarvar, tveir veðrar, *og* fjúrtan fyrsta árs lomb; tey skulu vera uttan lýti:

14 Og teirra matoffur *skal vera av* mjøli blandaðum við olju, tríggir tíggjunddeilir at hvørjum ungtarvi av teimum trettan ungtarvunum, tveir tíggjunddeilir til hvønn veðr av teimum tveimum veðrunum,

15 Og ein atskildan tíggjunddeil til hvørt lambið av teimum fjúrtan lombunum:

16 Og ēitt lamb av geitunum *til* eitt syndoffur; umframt tað áframhaldandi brenniofrið, matoffur hans, og drykkoffur hans.

17 ¶ Og á øðrum deginum *skulu tit ofra* tólv ungar ungtarvar, tveir veðrar, fjúrtan fyrsta árs lomb uttan blett:

18 Og matofrið hjá teimum og drykkofrini hjá teimum fyri ungtarvarnar, fyri veðrarnar, og fyri lombini, *skulu vera* samsvarandi við teirra tal, eftir háttarlaginum:

19 Og ēitt lamb av geitunum *til* eitt syndoffur; umframt tað áframhaldandi brenniofrið, og matofrið harav, og drykkofrini hjá teimum.

20 ¶ Og á tí triðja deginum ellivu ungtarvar, tveir veðrar, fjúrtan fyrsta árs lomb uttan lýti;

21 Og matofrið hjá teimum og drykkofrini hjá teimum fyri ungtarvarnar, fyri veðrarnar, og fyri lombini, *skulu vera* samsvarandi við teirra tal, eftir háttarlaginum:

22 Og ēina geit *til* eitt syndoffur; umframt tað áframhaldandi brenniofrið, og matoffur hans, og drykkoffur hans.

23 ¶ Og á tí fjórða deginum tíggju ungtarvar, tveir veðrar, *og* fjúrtan fyrsta árs lomb uttan lýti:

24 Matofrið hjá teimum og drykkofrini hjá teimum fyri ungtarvarnar, fyri veðrarnar, og fyri lombini, *skulu vera* samsvarandi við teirra tal, eftir háttarlaginum:

25 Og ēitt lamb av geitunum *til* eitt syndoffur; umframt tað áframhaldandi brenniofrið, matoffur hans, og drykkoffur hans.

26 ¶ Og á tí fimta deginum níggju ungtarvar, tveir veðrar, *og* fjúrtan fyrsta árs lomb uttan blett:

27 Og matofrið hjá teimum og drykkofrini hjá teimum fyri ung-

tarvarnar, fyri veðrarnar, og fyri lombini, *skulu vera* samsvarandi við teirra tal, eftir háttarlaginum:
28 Og ēina geit *til* eitt syndoffur; umframt tað áframhaldandi brenniofrið, og matoffur hans, og drykkoffur hans.
29 ¶ Og á tí sætta deginum átta ungtarvar, tveir veðrar, *og* fjúrtan fyrsta árs lomb uttan lýti:
30 Og matofrið hjá teimum og drykkofrini hjá teimum fyri ungtarvarnar, fyri veðrarnar, og fyri lombini, *skulu vera* samsvarandi við teirra tal, eftir háttarlaginum:
31 Og ēina geit *til* eitt syndoffur; umframt tað áframhaldandi brenniofrið, matoffur hans, og drykkoffur hans.
32 ¶ Og á tí sjeynda deginum sjey ungtarvar, tveir veðrar, *og* fjúrtan fyrsta árs lomb uttan lýti:
33 Og matofrið hjá teimum og drykkofrini hjá teimum fyri ungtarvarnar, fyri veðrarnar, og fyri lombini, *skulu vera* samsvarandi við teirra tal, eftir háttarlaginum:
34 Og ēina geit *til* eitt syndoffur; umframt tað áframhaldandi brenniofrið, matoffur hans, og drykkoffur hans.
35 ¶ Á tí áttanda deginum skulu tit hava eina hátíðar-savnan: tit skulu einkið tænarakent arbeiði gera *harí:*
36 Men tit skulu ofra eitt brennioffur, eitt sláturoffur gjørt við^ eldi, av einum søtum anga at HARRANUM: ēin ungtarv, ēin veðr, sjey fyrsta árs lomb uttan lýti:
37 Matofrið hjá teimum og drykkofrini hjá teimum fyri ungtarvin, fyri veðrin, og fyri lombini, *skulu vera* samsvarandi við teirra tal, eftir háttarlaginum:
38 Og ēina geit *til* eitt syndoffur; umframt tað áframhaldandi brenniofrið, og matoffur hans, og drykkoffur hans.
39 Hesi *ting* skulu tit gera at HARRANUM í tykkara fastsettu hátíðum; umframt heitstreingini hjá tykkum, og fríviljaofrini hjá tykkum, fyri brenniofrini hjá tykkum, og fyri matofrini hjá tykkum, og fyri drykkofrini hjá tykkum, og fyri friðofrini hjá tykkum.
40 Og Móses taldi Ísraels børnum samsvarandi við alt sum HARRIN skipaði Mósesi.

KAPITUL 30

OG Móses talaði við høvuðs*menninar* av ættargreinunum viðvíkjandi børnum Ísraels, sigandi, Hetta *er* tað tingið sum HARRIN hevur áboðið.
2 Um ein maður streingi eitt heiti at HARRANUM, ella svørji ein eið at binda sína sál við einum bandi; hann skal ikki bróta sítt orð, hann skal gera samsvarandi við alt sum útgongur út úr hans munni.
3 Um ein kvinna eisini streingi eitt heiti at HARRANUM, og bindi *seg sjálva* við einum bandi, *verandi* í húsi faðirs síns í sínum ungdómi;
4 Og hennara faðir hoyri hennara heiti, og hennara band, hvarvið hon hevur bundið sína sál, og hennara faðir skal halda sínum friði fyri henni: tá skulu øll hennara heitir standa, og hvørt band, hvarvið hon hevur bundið sína sál, skal standa.
5 Men um hennara faðir frávísi hana á tí degi sum hann hoyrir; skal ikki nakað av hennara heitum, ella av hennara bondum, hvarvið hon hevur bundið sína sál, standa: og HARRIN skal fyrigeva henni, av tí at hennara faðir frávísti hana.
6 Og um hon hevði yvirhøvur ein ektamann, tá ið hon heitti, ella mælti okkurt út av varrum sínum, hvarvið hon bant sína sál;
7 Og hennar ektamaður hoyrdi *tað,* og helt sínum friði fyri henni á tí degi sum hann hoyrdi *tað:*

tá skulu hennara heitir standa, og hennara bond, hvarvið hon bant sína sál, skulu standa.

8 Men um hennar ektamaður frávísti hana á tí degi sum hann hoyrdi *tað,* tá skal hann gera hennara heiti sum hon heitti, og tað sum hon mælti við sínum varrum, hvarvið hon bant sína sál, av ongari virkni: og HARRIN skal fyrigeva henni.

9 Men hvørt heiti hjá einkju, og hjá henni sum er fráskild, hvarvið tær hava bundið sínar sálir, skal standa ímóti henni.

10 Og um hon heitti í húsi ektamans síns, ella bant sína sál við einum bandi við einum eiði;

11 Og hennar ektamaður hoyrdi *tað,* og helt sínum friði fyri henni, *og* frávísti hana ikki: tá skulu øll hennara heitir standa, og hvørt band, hvarvið hon bant sína sál, skal standa.

12 Men um hennar ektamaður hevur aldeilis gjørt tey ógild á tí degi hann hoyrdi *tey; tá* skal hvatsumhelst *ið* framgekk út av hennara varrum viðvíkjandi hennara heitum, ella viðvíkjandi bandinum av hennara sál, ikki standa: hennar ektamaður hevur gjørt tey ógild; og HARRIN skal fyrigeva henni.

13 Hvørt heiti, og hvør bindandi eiður at níva sálina, hennar ektamaður kann staðfesta tað, ella hennar ektamaður kann gera tað ógilt.

14 Men um hennar ektamaður aldeilis haldi sínum friði fyri henni frá degi til dags; tá staðfestir hann øll hennara heitir, ella øll hennara bond, sum *eru* uppiá henni: hann staðfestir tey, av tí at hann helt sínum friði fyri henni á tí degi sum hann hoyrdi *tey*.

15 Men um hann skal nakrar hættir gera tey ógild, eftir at hann hevur hoyrt *tey;* tá skal hann bera hennara misgerð.

16 Hesar *eru* ásetingarnar, sum HARRIN skipaði Mósesi, ímillum ein mann og konu hansara, ímillum faðirin og dóttur hansara, *verandi enn* í sínum ungdómi í húsi faðirs síns.

KAPITUL 31

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,

2 Hevn Ísraels børn á Mī-dī-ă-nīt´-arnar: síðan skalt tú verða savnaður at fólki tínum.

3 Og Móses talaði við fólkið, sigandi, Vápnið summar av tykkum til kríggið, og latið teir fara ímóti Mī-dī-ă-nīt´-unum, og hevnið HARRAN á Mī´-dī-ăn.

4 Av hvørji ættargrein eitt túsund, út gjøgnum allar ættargreinir Ísraels, skulu tit senda til kríggið.

5 So tað vórðu flýggjaðar úr Ísraels túsundum, eitt túsund burtur úr *hvørji* ættargrein, tólv túsund vápnaðir til kríggj.

6 Og Móses sendi teir til kríggið, eitt túsund úr *hvørji* ættargrein, teir og Phī´-nē-hās, son Ēl-ē-ā´-zâr-s prests, til kríggið, við hinum heilagu amboðunum, og lúðrunum til at blása í síni hond.

7 Og teir kríggjaðust ímóti Mī-dī-ă-nīt´-unum, eins og HARRIN bjóðaði Mósesi; og teir vógu allar kallarnar.

8 Og teir vógu kongarnar av Mī´-dī-ăn, umframt restina av teimum sum vórðu vignir; *nevniliga,* Ē´-vī, og Rē´-kĕm, og Zūr, og Hūr, og Rē´-bă, fimm kongar av Mī´-dī-ăn: Bá´-lāām eisini Bē´-ōr-s son vógu teir við svørðinum.

9 Og Ísraels børn tóku *allar* kvinnurnar av Mī´-dī-ăn *til* fangar, og hini smáu teirra, og tóku ránsfæið av øllum teirra fenaði, og øllum teirra smáfæafylgjum, og øllum teirra góðsi.

10 Og teir brendu allar teirra staðir, í hvørjum teir dvaldust, og øll teirra stásiligu slott, við eldi.

11 Og teir tóku alt ránsfæið, og allan herfongin, *bæði* av monnum og av djórum.
12 Og teir førdu fangarnar, og herfongin, og ránsfæið, at Mósesi, og Ēl-ē-ā´-zâr-i presti, og at samkomu Ísraels barna, at leirinum við slættar Móabs, sum *eru* við Jordan *nær* Jericho.
13 ¶ Og Móses, og Ēl-ē-ā´-zâr prestur, og allir prinsarnir av samkomuni, fóru út at møta teimum útum leirin.
14 Og Móses var vreiður við yvirmenninar av herliðinum, *við* høvuðsmenninar yvir túsundum, og høvuðsmenn yvir hundraðum, sum komu frá bardaganum.
15 Og Móses segði við teir, Hava tit frelst allar kvinnurnar á lívi?
16 Sí, hesar elvdu Ísraels børnum, ígjøgnum ráð Bá´-lāām-s, at fremja misbrot ímóti HARRANUM í málevni Pē´-ôr-s, og har var ein plága millum samkomu HARRANS.
17 Nú tessvegna, drepið hvønn kallkyns millum hinna smáu, og drepið hvørja kvinnu sum hevur kent mann við^ at liggja við honum.
18 Men øll kvennbørnini, sum hava ikki kent mann við^ at liggja við honum, haldið á lívi til tykkara sjálvs.
19 Og verðið tit uttanfyri leirin sjey dagar: hvørsumhelst *ið* hevur dripið nakran persón, og hvørsumhelst *ið* hevur nomið við nakran vignan, skírgið *bæði* tykkum sjálvar og tykkara fangar í tí triðja deginum, og í tí sjeynda deginum.
20 Og skírgið allan *tykkara* klædnað, og alt sum er gjørt úr skinnum, og alt verk av geita*hári*, og øll ting gjørd úr viði.
21 ¶ Og Ēl-ē-ā´-zâr prestur segði við krígsmenninar sum fóru til orrustuna, Hetta *er* regluskipan lógarinnar sum HARRIN bjóðaði Mósesi;
22 Einans gullið, og silvurið, messingurin, jarnið, tinið, og blýggið,
23 Alt sum kann viðstanda eldin, tit skulu lata *tað* fara ígjøgnum eldin, og tað skal verða reint: hóast hetta, tað skal verða skírgað við atskiljingar-vatninum: og alt, sum viðstendur ikki eldin, skulu tit fáa *at* fara ígjøgnum vatnið.
24 Og tit skulu tváa tykkara klæðir í tí sjeynda deginum, og tit skulu verða reinir, og síðani skulu tit koma inn í leirin.
25 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,
26 Tak samløguna av herfonginum sum varð tikin, *bæði* av manni og av djóri, tú, og Ēl-ē-ā´-zâr prestur, og teir fremstu fedrarnir av samkomuni:
27 Og skiljið herfongin í tveir partar; ímillum teir sum tóku kríggið uppá seg, sum fóru út til orrustu, og ímillum alla samkomuna:
28 Og innkalla eitt íkast at HARRANUM frá krígsmonnunum sum fóru út til orrustu: ēina sál av fimm hundrað, *bæði* av persónunum, og av búfflunum, og av asnunum, og av seyðinum:
29 Takið *tað* av teirra hálvu, og gev *tað* at Ēl-ē-ā´-zâr-i presti, *til* eitt hevjioffur HARRANS.
30 Og av hálvu Ísraels barna, skalt tú taka ēin skamt av fimti, av persónunum, av búfflunum, av asnunum, og av smáfæafylgjunum, av alskyns djórum, og geva tey at Levitunum, sum halda álegginga av tabernakli HARRANS.
31 Og Móses og Ēl-ē-ā´-zâr prestur gjørdu sum HARRIN bjóðaði Mósesi.
32 Og býtið, *verandi* restin av herfonginum sum krígsmenninir høvdu fangað, var seks hundrað túsund og sjeyti túsund og fimm túsund seyðir,
33 Og trísinstjúgu og tólv túsund búfflar,

34 Og trísinstjúgu og eitt túsund asnar,
35 Og tríati og tvey túsund persónar í alt, av kvinnum sum høvdu ikki kent mann við˙ at liggja við honum.
36 Og tann hálvan, *sum var* skamturin hjá teimum sum fóru út til kríggj, var í tali trý hundrað túsund og sjey og tríati túsund og fimm hundrað seyðir:
37 Og HARRANS íkast av seyðinum var seks hundrað og trísinstjúgu og fimtan.
38 Og búfflarnir *vóru* tríati og seks túsund; av hvørjum HARRANS íkast *var* trísinstjúgu og tólv.
39 Og asnarnir *vóru* tríati túsund og fimm hundrað; av hvørjum HARRANS íkast *var* trísinstjúgu og ēin.
40 Og persónarnir *vóru* sekstan túsund; av hvørjum HARRANS íkast *var* tríati og tveir persónar.
41 Og Móses gav íkastið, *sum var* HARRANS hevjioffur, at Ĕl-ĕ-ā´-zâr presti, eins og HARRIN skipaði Mósesi.
42 Og av hálvu Ísraels barna, sum Móses skildi frá monnunum sum kríggjaðu,
43 (Nú tann hálvan, *sum tilhoyrdi* samkomuni, var trý hundrað túsund og tríati túsund *og* sjey túsund og fimm hundrað seyðir,
44 Og tríati og seks túsund búfflar,
45 Og tríati túsund asnar og fimm hundrað,
46 Og sekstan túsund persónar;)
47 Enntá av Ísraels barna hálvu, tók Móses ēin skamt av fimti, *bæði* av manni og djóri, og gav tey at Levitunum, sum hildu áleggingina av tabernakli HARRANS; eins og HARRIN bjóðaði Mósesi.
48 ¶ Og yvirmenninir sum *vóru* yvir túsundum av herliðinum, høvuðsmenninir av túsundum, og høvuðsmenninir av hundraðum, komu nær at Mósesi:
49 Og teir søgdu við Móses, Tínir tænarar hava tikið samløguna av krígsmonnunum sum *eru* undir álegging vári, og tað vantar ikki ēin maður av okkum.
50 Vit eru tí komnir við einum tilbiðjanar-ofri til HARRANS, tað *sum* hvør maður hevur fingið, av smúkkum av gulli, ketum, og armbondum, ringum, oyrnaringum, og *prýðis*plátum, til at gera eina sáttargerð fyri okkara sálir frammi fyri HARRANUM.
51 Og Móses og Ĕl-ĕ-ā´-zâr prestur tóku gullið av teimum, *enntá* allar virkaðar smúkkur.
52 Og alt gullið av ofrinum sum teir ofraðu upp til HARRANS, av høvuðsmonnunum av túsundum, og av høvuðsmonnunum av hundraðum, var sekstan túsund *og* sjey hundrað og fimti sjē´-kl-ar.
53 (*Tí at* krígsmenninir høvdu tikið herfong, hvør maður til sín sjálvs.)
54 Og Móses og Ĕl-ĕ-ā´-zâr prestur tóku gullið av høvuðsmonnunum av túsundum og av hundraðum, og komu við tí inn í samkomu-tabernaklið, *til* eitt minni fyri Ísraels børn frammi fyri HARRANUM.

KAPITUL 32

NÚ, Reûbens børn og Gáds børn høvdu eina sera mikla fjøld av fenaði: og tá ið teir sóu land Jā´-zĕr-s, og land Gileads, at sí, staðið *var* eitt stað til fenað;
2 Komu Gáds børn og Reûbens børn og talaðu við Móses, og til Ĕl-ĕ-ā´-zâr-s prests, og við prinsarnar av samkomuni, sigandi,
3 Ăt´-ā-rōth, og Dī´-bŏn, og Jā´-zĕr, og Nimrah, og Hĕsj´-bŏn, og Ĕl-ĕ-ā´-lēh, og Sjē´-băm, og Nē´-bō, og Bē´-ŏn,
4 *Enntá* landið sum HARRIN

sló frammi fyri samkomu Ísraels, *er* eitt land til fenað, og tænarar tínir hava fenað:

5 Hvørsvegna, søgdu teir, um vit hava funnið náði í eygsjón tíni, lat hetta land verða givið tænarum tínum til ognar, *og* før okkum ikki yvirum Jordan.

6 ¶ Og Móses segði við Gáds børn og til Reubens barna, Skulu tykkara brøður fara til kríggj, og skulu tit sita her?

7 Og hvørsvegna mismótiga tit hjartað hjá Ísraels børnum frá at fara yvir í landið sum HARRIN hevur givið teimum?

8 Svá gjørdu fedrar tykkara, tá ið eg sendi teir frá Ká´-dēsj-bărnē´-ŭ at síggja landið.

9 Tí at tá ið teir fóru niðan at dali Ēsj´-cŏl-s, og sóu landið, mismótigaðu teir hjartað hjá Ísraels børnum, at teir skuldu ei fara inn í landið sum HARRIN hevði givið teimum.

10 Og HARRANS firtni varð kynd hina somu tíð, og hann svór, sigandi,

11 Vissuliga, eingin av monnunum sum komu upp út úr Egyptalandi, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, skal síggja landið sum eg svór at Ábrahami, at Ísaaki, og at Jákobi; av tí at teir hava ikki heil*veg*is fylgt mær:

12 Uttan Caleb, sonur Jē´-phŭnnēh Kē-nēz-ĭt´-a; og Josjua Nuns sonur: tí at teir hava heil*veg*is fylgt HARRANUM.

13 Og HARRANS firtni varð kynd ímóti Ísrael, og hann fekk teir *at* reika *um* í oyðuni *í* fjøruti ár, inntil alt tað ættarliðið, sum hevði gjørt ilt í eygsjón HARRANS, var upptært.

14 Og sí, tit eru risnir upp í stað fedra tykkara, ein fjølgan av syndafullum monnum, til at økja enn *um* hina grimmu firtni HARRANS mótvegis Ísrael.

15 Tí at um tit vendi burt frá *at fara* aftaná honum, vil hann uppaftur eftirlata teir í oyðuni; og tit skulu oyðileggja alt hetta fólk.

16 ¶ Og teir komu nær at honum, og søgdu, Vit vilja byggja seyðabyrgir her til fenað váran, og staðir til hini smáu vári:

17 Men vit sjálvir vilja fara búgvið vápnaðir undan Ísraels børnum, inntil vit hava ført teir at teirra plássi: og hini smáu okkara skulu dvøljast í hinum girdu staðunum uppá grund av íbúgvum landins.

18 Vit vilja ikki venda aftur at húsum várum, inntil Ísraels børn hava arvað hvør maður arv sín.

19 Tí at vit vilja ikki arva við teimum hasumegin Jordan, ella frameftir; av tí at okkara arvur er fallin til okkara hesumegin Jordan eystanvert.

20 ¶ Og Móses segði við teir, Um tit vilji gera hetta ting, um tit vilji fara vígbúnir frammi fyri HARRANUM til kríggj,

21 Og vilji fara allir av tykkum vígbúnir yvirum Jordan frammi fyri HARRANUM, inntil hann havi rikið út sínar figgindar undan sær,

22 Og landið verði undirlagt frammi fyri HARRANUM: tá aftaná skulu tit venda aftur, og vera sakleysir frammi fyri HARRANUM, og frammi fyri Ísrael, og hetta land skal vera ogn tykkara frammi fyri HARRANUM.

23 Men um tit vilji ei gera so, sí, tit hava syndað ímóti HARRANUM: og verið vísir *í, at* tykkara synd vil spora tykkum upp.

24 Byggið tykkum staðir til hini smáu tykkara, og byrgir til seyð tykkara; og gerið tað sum hevur útgingið út úr munni tykkara.

25 Og Gáds børn og Reubens børn talaðu við Móses, sigandi, Tínir tænarar vilja gera sum harri mín ábýður.

26 Hini smáu okkara, konur okkara, smáfæafylgir okkara, og

allur fenaður okkara, skulu vera har í staðum Gileads:
27 Men tínir tænarar vilja fara yvirum, hvør maður vápnaður til kríggj, frammi fyri HARRANUM til orrustu, eins og harri mín sigur.
28 So viðvíkjandi teimum á-bjóðaði Móses Ēl-ē-ā´-zâr-i presti, og Josjua Nuns syni, og hinum fremstu fedrum av ættargreinum Ísraels barna:
29 Og Móses segði við teir, Um Gáds børn og Reûbens børn vilji fara við tykkum yvirum Jordan, hvør maður vígbúgvin til orrustu, frammi fyri HARRANUM, og landið skal verða undirlagt frammi fyri tykkum; tá skulu tit geva teimum land Gileads til ognar:
30 Men um teir vilji ei fara yvirum við tykkum vígbúnir, *so* skulu teir hava ognir tykkara millum í landi Cānaans.
31 Og Gáds børn og Reûbens børn svaraðu, sigandi, Eins og HARRIN hevur sagt við tænarar tínar, soleiðis vilja vit gera.
32 Vit vilja fara yvirum vígbúnir frammi fyri HARRANUM inn í land Cānaans, at okkar arvsogn hesumegin Jordan *má vera* okkara.
33 Og Móses gav innat teimum, *enntá* til Gáds barna, og til Reûbens barna, og innat hálvari ættargrein Mă-năs´-sēh-s Jósephs sonar, kongadømi Sī´-hŏn-s Amorita kongs, og kongadømi Ōgs kongs av Bá´-sjān, landið, við staðunum harav á breddunum, *enntá* staðirnar av landinum runt umkring.
34 ¶ Og Gáds børn bygdu Dī´-bŏn, og Ăt´-ā-rōth, og Á´-rō-ēr,
35 Og Ăt´-rōth, Sjō´-phăn, og Jâ-ā´-zēr, og Jŏg´-bē-hâh,
36 Og Bēth-nīm´-răh, og Bēth-hár´-ăn, girdar staðir: og byrgir til seyð.
37 Og Reûbens børn bygdu Hēsj´-bŏn, og Ēl-ē-ā´-lêh, og Kĭr-jâ-thá´-ĭm,
38 Og Nē´-bō, og Bā´-ăl-mē´-ōn, (teirra nøvn verðandi broytt,) og Sjĭb´-măh: og góvu staðunum, sum teir bygdu, onnur nøvn.
39 Og børn Má´-chīr-s Mă-năs´-sēh sonar fóru til Gilead, og tóku tað, og gjørdu ognarleysan Amoritan sum *var* í tí.
40 Og Móses gav Gilead innat Má´-chīr-i Mă-năs´-sēh syni; og hann dvaldist harí.
41 Og Já´-ir Mă-năs´-sēh sonur fór og tók hinar smáu býirnar hjá tí, og kallaði teir Há´-vōth-já´-īr.
42 Og Nō´-băh fór og tók Kē´-năth, og bygdirnar hjá tí, og kallaði tað Nō´-băh, eftir egna navni sínum.

KAPITUL 33

HESAR *eru* ferðir Ísraels barna, sum fóru út úr Egyptalandi við herum sínum undir hendi Móse og Aarons.
2 Og Móses skrivaði teirra útfaringar samsvarandi við teirra ferðir eftir ábjóðan HARRANS: og hesar *eru* teirra ferðir samsvarandi við teirra útfaringar.
3 Og teir fóru avstað frá Răm´-ē-sēs í tí fyrsta mánaðinum, á hinum fimtanda degi hins fyrsta mánaðar; á morgindeginum eftir umleypið fóru Ísraels børn út við eini høgari hond í eygsjónini á øllum Egyptunum.
4 Tí at Egyptarnir jarðaðu allar *sínar* frumburðir, sum HARRIN hevði sligið teirra millum: omanyvir teirra gudar eisini HARRIN útinti dómar.
5 Og Ísraels børn burtfluttu frá Răm´-ē-sēs, og slógu upp í Sŭc´-cōth.
6 Og teir fóru avstað frá Sŭc´-cōth, og slógu upp í Ē´-thăm, sum *er* í kantinum av oyðuni.
7 Og teir burtfluttu frá Ē´-thăm, og vendu aftur at Pī-hă-hī´-rōth, sum *er* frammanfyri Bā´-ăl-zē´-phŏn: og teir slógu upp frammanfyri Mĭg´-dōl.

8 Og teir fóru avstað frá frammanfyri Pī-hă-hī´-rōth, og fóru ígjøgnum miðjuna av sjónum inn í oyðuna, og fóru tríggja daga ferð inn í Ē´-thăm-s oyðu, og slógu upp í Már´-ăh.

9 Og teir burtfluttu frá Már´-ăh, og komu at Ē´-lĭm: og í Ē´-lĭm *vóru* tólv keldur av vatni, og trísinstjúgu og tíggju pálmatrø; og teir slógu upp har.

10 Og teir burtfluttu frá Ē´-lĭm, og leiraðust við Reyða-havið.

11 Og teir burtfluttu frá Reyða-havinum, og leiraðust í Sīns oyðu.

12 Og teir tóku sína ferð út úr Sīns oyðu, og leiraðust í Dŏph´-kăh.

13 Og teir fóru avstað frá Dŏph´-kăh, og leiraðust í Á´-lūsj.

14 Og teir burtfluttu frá Á´-lūsj, og leiraðust í Rĕph´-ĭ-dĭm, har einkið vatn var hjá fólkinum at drekka.

15 Og teir fóru avstað frá Rĕph´-ĭ-dĭm, og slógu upp í Sĭ´-nāĭ-s oyðu.

16 Og teir burtfluttu frá Sĭ´-nāĭ-s oyðimørk, og slógu upp við Kĭb´-rōth-hăt-tă-á´-vâh.

17 Og teir fóru avstað frá Kĭb´-rōth-hăt-tă-á´-vâh, og leiraðust við Há´-zĕ-rōth.

18 Og teir fóru avstað frá Há´-zĕ-rōth, og slógu upp í Rĭth´-măh.

19 Og teir fóru avstað frá Rĭth´-măh, og slógu upp við Rĭm´-mŏn-pár´-ĕz.

20 Og teir fóru avstað frá Rĭm´-mŏn-pár´-ĕz, og slógu upp í Lĭb´-năh.

21 Og teir burtfluttu frá Lĭb´-năh, og slógu upp við Rĭs´-săh.

22 Og teir ferðaðust frá Rĭs´-săh, og slógu upp í Kĕ-hĕ-lā´-thăh.

23 Og teir fóru frá Kĕ-hĕ-lā´-thăh, og slógu upp á Sjá´-phĕr fjalli.

24 Og teir burtfluttu frá Sjá´-phĕr fjalli, og leiraðust í Hă-rá´-dăh.

25 Og teir burtfluttu frá Hă-rá´-dăh, og slógu upp í Măk-hĕ´-lōth.

26 Og teir burtfluttu frá Măk-hĕ´-lōth, og leiraðust við Tá´-hăth.

27 Og teir fóru avstað frá Tá´-hăth, og slógu upp við Tár´-ăh.

28 Og teir burtfluttu frá Tár´-ăh og slógu upp í Mĭth´-căh.

29 Og teir fóru frá Mĭth´-căh, og slógu upp í Hăsj-mō´-năh.

30 Og teir fóru avstað frá Hăsj-mō´-năh, og leiraðust við Mó´-sĕ-rōth.

31 Og teir fóru avstað frá Mó´-sĕ-rōth, og slógu upp í Bĕn´-ê-já´-ă-kăn.

32 Og teir burtfluttu frá Bĕn´-ê-já´-ă-kăn, og leiraðust við Hôr-hă-gĭd´-găd.

33 Og teir fóru frá Hôr-hă-gĭd´-găd, og slógu upp í Jōt´-bă-thăh.

34 Og teir burtfluttu frá Jōt´-bă-thăh, og leiraðust við Ĕb-rō´-năh.

35 Og teir fóru avstað frá Ĕb-rō´-năh, og leiraðust við Ē´-zĭ-ŏn-gā´-bĕr.

36 Og teir burtfluttu frá Ē´-zĭ-ŏn-gā´-bĕr, og slógu upp í Zīns oyðu, sum *er* Ká´-dĕsj.

37 Og teir burtfluttu frá Ká´-dĕsj, og slógu upp á Hór fjalli, í kantinum av landi Ē´-dóm-s.

38 Og Aaron prestur fór niðan á Hór fjall eftir ábjóðan HARRANS, og doyði har, í tí fjørutiunda árinum eftir *at* Ísraels børn vóru komnir út úr Egyptalandi, í hinum fyrsta *degi* hins fimta mánaðar.

39 Og Aaron *var* eitt hundrað og tjúgu og trý ára gamalur, tá ið hann doyði á Hór fjalli.

40 Og kong Ár´-ăd, Cānaanitin, sum dvaldist í sunnan í landi Cānaans, hoyrdi um komu Ísraels barna.

41 Og teir fóru avstað frá Hór fjalli, og slógu upp í Zăl-mō´-năh.

42 Og teir fóru avstað frá Zăl-mō´-năh, og slógu upp í Pū´-nōn.
43 Og teir fóru avstað frá Pū´-nōn, og slógu upp í Ō´-bôth.
44 Og teir fóru avstað frá Ō´-bôth, og slógu upp í Ī´-jĕ-ăb´-ă-rīm, í marki Móabs.
45 Og teir fóru avstað frá Ī´-ĭm, og slógu upp í Dī´-bŏn-gád.
46 Og teir burtfluttu frá Dī´-bŏn-gád, og leiraðust í Ăl´-mŏn-dīb-lă-thá´-ĭm.
47 Og teir burtfluttu frá Ăl´-mŏn-dīb-lă-thá´-ĭm, og slógu upp á fjøllum Áb´-ă-rīm-s, frammanfyri Nĕ´-bō.
48 Og teir fóru avstað frá fjøllum Áb´-ă-rīm-s, og slógu upp á slættum Móabs við Jordan *nær* Jericho.
49 Og teir slógu upp við Jordan, frá Bĕth-jēs´-ĭ-mōth *enntá* at Á´-bĕl-sjĭt´-tĭm á slættum Móabs.
50 ¶ Og HARRIN talaði við Móses á slættum Móabs við Jordan *nær* Jericho, sigandi,
51 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Tá ið tit eru farnir yvirum Jordan inn í land Cānaans;
52 Tá skulu tit reka út allar íbúgvar landsins frammanfyri tykkum ífrá, og oyðileggja øll teirra bíløt, og oyðileggja allar teirra bræddu myndir, og heilt ríva niður øll teirra høgu pláss:
53 Og tit skulu gera ognarleysar *íbúgvar* landsins, og dvøljast harí: tí at eg havi givið tykkum landið at ognast tað.
54 Og tit skulu skifta landið við lut*akast*i til ein arv millum familjur tykkara: *og* til hini fleiri skulu tit geva tess meiri arv, og til hini færri skulu tit geva tess minni arv: hvørs mans *arvur* skal vera í tí plássi, har hansara lutur fellur; samsvarandi við ættargreinirnar hjá fedrum tykkara skulu tit arva.
55 Men um tit ei vilji reka út íbúgvar landsins frammanfyri tykkum ífrá; tá skal tað bera á, at teir, sum tit lata vera eftir av teimum, *skulu vera* broddar í eygum tykkara, og tornir í síðum tykkara, og skulu níva tykkum í landinum, í hvørjum tit dvøljast.
56 Harafturat skal tað bera á, *at* eg skal gera at tykkum, eins og eg hugsaði at gera at teimum.

KAPITUL 34

OG HARRIN talaði við Móses, sigandi,
2 Bjóða børnum Ísraels, og sig við teir, Tá ið tit koma inn í land Cānaans; (hetta *er* landið sum skal falla tykkum til arvs, *enntá* Cānaans land við útjaðarunum av tí:)
3 Tá skal tykkara suður umráði vera frá Zíns oyðu frameftir við bredda Ē´-dóm-s, og tykkara suður mark skal vera hin ytsti breddi av salt havinum eystanvert:
4 Og tykkara mark skal venda úr suðri til uppstíging Āk-răb´-bĭm-s, og fara áfram til Zīn: og framfaringin hjá tí skal vera úr suðri til Ká´-dĕsj-băr-nē´-ū, og skal fara áfram til Hā´-zâr-ăd´-dâr, og fara áfram til Āz´-mŏn:
5 Og markið skal heinta *sær* ein bug frá Āz´-mŏn at Egyptalands ánni, og útgongdirnar av tí skulu vera við sjógvin.
6 Og *hvat* tí vestara markinum *viðvíkur,* tit skulu enntá hava havið mikla til eitt mark: hetta skal vera tykkara vestur mark.
7 Og hetta skal vera tykkara norður mark: frá havinum mikla skulu tit peika út til tykkum Hór fjall:
8 Frá Hór fjalli skulu tit peika út *tykkara mark* at inngongd Há´-măth-s; og framfaringarnar av markinum skulu vera til Zē´-dăd:
9 ¶ Og markið skal fara áfram til Zīph´-rŏn, og útgongdirnar hjá

tí skulu vera við Hā´-zâr-ē´-năn: hetta skal vera tykkara norður mark.

10 Og tit skulu peika út tykkara eystur mark frá Hā´-zâr-ē´-năn til Sjē´-phăm:

11 Og breddin skal fara niður frá Sjē´-phăm til Rĭb´-lăh, á eystur síðuni av Ā´-ĭn; og markið skal fara omaneftir, og skal røkka at síðuni av Chĭn´-nĕ-rĕth-s havi eystanvert:

12 Og markið skal fara oman til Jordan, og útgongdirnar av tí skulu vera við salt havið: hetta skal vera land tykkara við breddunum hjá tí runt umkring.

13 Og Móses ábjóðaði Ísraels børnum, sigandi, Hetta *er* landið sum tit skulu arva við^ lut*akast*i, sum HARRIN ábeyð at geva teimum níggju ættargreinunum, og til hina hálvu ættargrein:

14 Tí at ættargrein Reûbens barna samsvarandi við hús fedra teirra, og ættargrein Gáds barna samsvarandi við hús fedra teirra, hava fingið *sín arv;* og hálv ættargrein Mă-năs´-sĕh hava fingið sín arv:

15 Tær tvær ættargreinirnar og tann hálva ættargreinin hava móttikið sín arv hesumegin Jordan *nær* Jericho eystureftir, ímóti sólarrisinum.

16 Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

17 Hesi *eru* nøvnini á monnunum sum skulu skifta landið at tykkum: Ĕl-ĕ-ā´-zâr prestur, og Josjua Nuns sonur.

18 Og tit skulu taka ēin prins av hvørji ættargrein, til at skifta landið eftir arvi.

19 Og nøvnini hjá monnunum *eru* hesi: Av Judah ættargrein, Caleb Jē´-phŭn-nĕh sonur.

20 Og av ættargrein Símeons barna, Sjē´-mû-ĕl Ăm´-mĭ-hŭd-s sonur.

21 Av Benjamins ættargrein, Ē´-lĭ-dăd Chĭs´-lŏn-s sonur.

22 Og prinsurin av ættargrein Dáns barna, Bŭk´-kī Jŏg´-lī-s sonur.

23 Prinsurin av Józephs børnum, fyri ættargrein Mă-năs´-sĕh barna, Hăn´-nĭ-ĕl Ē´-phŏd-s sonur.

24 Og prinsurin av ættargrein Ē´-phrră-ĭm-s barna, Kē´-mû-ĕl Sjĭph´-tăn-s sonur.

25 Og prinsurin av ættargrein Zē´-bŭ-lŏn-s barna, Ĕ-lĭ´-zā-phăn Pâr´-năch-s sonur.

26 Og prinsurin av ættargrein Ĭs´-să-châr-s barna, Păl´-tî-ĕl Azzans sonur.

27 Og prinsurin av ættargrein Ásjers barna, Á´-hĭ-hŭd Sjē-lō´-mī-s sonur.

28 Og prinsurin av ættargrein Năph´-tâ-lī-s barna, Pĕ-dâh´-ĕl Ăm´-mĭ-hŭd-s sonur.

29 Hesir *eru teir,* hvørjum HARRIN skipaði at skifta Ísraels børnum arvin í landi Cânaans.

KAPITUL 35

OG HARRIN talaði við Móses á slættum Móabs við Jordan *nær* Jericho, sigandi,

2 Bjóða børnum Ísraels, at teir gevi Levitunum av arvi ognar sínar staðir at dvøljast í; og tit skulu geva *eisini* Levitunum forstaðir til staðirnar runt um teir.

3 Og staðirnar skulu teir hava til at dvøljast í; og forstaðirnir av teimum skulu vera til teirra fenað, og til teirra góðs, og til øll teirra djór.

4 Og forstaðirnir av staðunum, sum tit skulu geva Levitunum, *skulu røkka* frá múrinum av staðinum og úteftir eitt túsund alnir rundan um.

5 Og tit skulu máta frá uttanfyri staðin á eystur síðuni tvey túsund alnir, og á suður síðuni tvey túsund alnir, og á vestur síðuni tvey túsund alnir, og á norður síðuni tvey túsund alnir; og staðurin skal vera í miðjuni:

hetta *skulu vera* hjá teimum forstaðir staðanna.

6 Og millum staðanna, sum tit skulu geva Levitunum, *skulu tað vera* seks staðir til grið, sum tit skulu útpeika til manndráparan, at hann má flýggja hagar: og til teirra skulu tit leggja afturat fjøruti og tveir staðir.

7 *So* allir staðirnir, sum tit skulu geva til Levitanna, *skulu vera* fjøruti og átta staðir: teir *skulu tit geva* við teirra forstaðum.

8 Og staðirnir, sum tit skulu geva, *skulu vera* av ogn Ísraels barna: frá *teimum, ið hava* mangar, skulu tit geva mangar; men frá *teimum, ið hava* fáar, skulu tit geva fáar: hvør *og* ein skal geva av sínum staðum at Levitunum samsvarandi við sín arv sum hann arvar.

9 ¶ Og HARRIN talaði við Móses, sigandi,

10 Tala við børn Ísraels, og sig við teir, Tá ið tit verði komnir yvirum Jordan inn í land Cánaans;

11 Tá skulu tit útpeika tykkum staðir til at vera griðsstaðir hjá tykkum; at bana*maður*in má flýggja hagar, sum drepur nakran persón av óvart.

12 Og teir skulu vera tykkum staðir til grið frá hevnaranum; at manndráparin doyggi ei, inntil hann standi frammi fyri samkomuni í dómi.

13 Og av hesum staðunum, sum tit skulu geva, skulu tit hava seks staðir til grið.

14 Tit skulu geva tríggjar staðir hesumegin Jordan, og tríggjar staðir skulu tit geva í landi Cánaans, *sum* skulu vera griðsstaðir.

15 Hesir seks staðirnir skulu vera eitt griðs*stað, bæði* hjá Ísraels børnum, og hjá tí fremmanda, og hjá útisetanum teirra millum: at hvør tann, sum drepur nakran persón óvarugt, má flýggja hagar.

16 Og um hann slái hann við einum amboði av jarni, so at hann doyggi, hann *er* ein myrðari: myrðarin skal vissuligani verða tikin av lívi.

17 Og um hann slái hann við at kasta ein stein, hvarvið hann kann doyggja, og hann doyggi, hann *er* ein myrðari: myrðarin skal vissuligani verða tikin av lívi.

18 Ella *um* hann slái hann við einum hondvápni av træi, hvarvið hann kann doyggja, og hann doyggi, hann *er* ein myrðari: myrðarin skal vissuligani verða tikin av lívi.

19 Blóðshevnarin sjálvur skal vega myrðaran: tá ið hann møtir honum, skal hann vega hann.

20 Men um hann stoyti hann av hatri, ella sleingi eftir honum við^ liggjan á lúri, at hann doyggi;

21 Ella í figgindskapi slái hann við síni hond, *so* at hann doyggi: hann, ið sló *hann,* skal vissuligani verða tikin av lívi; *tí at* hann *er* ein myrðari: blóðshevnarin skal vega myrðaran, tá ið hann hittir hann.

22 Men um hann stoyti hann brádligani uttan figgindskap, ella havi kastað uppá hann nakað ting uttan liggjan á lúri,

23 Ella við nøkrum steini, hvarvið ein maður kann doyggja, síggjandi *hann* ei, og kasti *hann* uppá hann, *so* at hann doyggi, og *var* ikki hansara figgindi, eiheldur søkti hansara mein:

24 Tá skal samkoman døma ímillum bana*mann*in og blóðshevnaran samsvarandi við hesar dómar:

25 Og samkoman skal útfría bana*mann*in út úr blóðshevnarans hond, og samkoman skal endurbøta hann til staðar griðs hansara, hvagar hann var flýddur: og hann skal verða í honum til deyða høvuðsprestsins, sum varð salvaður við hini heilagu olju.

26 Men um bana*maður*in skal

til nakra tíð koma útum markið á staði griðs síns, hvagar hann var flýddur;

27 Og blóðshevnarin finni hann uttanfyri mørkini av staði griðs hansara, og blóðshevnarin drepi bana*mann*in; hann skal ikki vera sekur í blóði:

28 Av tí at hann skuldi havt verðið verandi í staði griðs síns inntil deyða høvuðsprestsins: men eftir deyða høvuðsprestsins skal bana*maður*in venda aftur inn í land ognar sínar.

29 So hesi *tingini* skulu vera til eina dómsáseting hjá tykkum út gjøgnum ættarliðir tykkara í øllum bústøðum tykkara.

30 Hvør*ið*enn drepur nakran persón, myrðarin skal verða tikin av lívi eftir munni vitna: men ēitt vitni skal ikki vitna ímóti nøkrum persóni *til at volda honum* at doyggja.

31 Harafturat skulu tit onga bøting taka fyri lívið hjá einum myrðara, sum *er* deyðssekur: men hann skal vissuligani verða tikin av lívi.

32 Og tit skulu onga bøting taka fyri hann sum er flýddur til staðar griðs síns, at hann skuldi komið aftur at dvøljast í landinum, inntil deyða prestsins.

33 Soleiðis skulu tit ikki óreinka landið, í hvørjum tit *eru:* tí at blóð, tað óreinkar landið: og landið kann ei verða reinsað fyri blóðið sum er helt hart, uttan við blóðinum á honum sum helti tað.

34 Óreinkið ikki tessvegna landið sum tit skulu ídvølja, í hvørjum eg dvøljist: tí at eg, HARRIN, dvøljist millum Ísraels barna.

KAPITUL 36

OG teir fremstu fedrarnir av familjunum hjá børnum Gileads, sonar Má′-chīr-s, sonar Mă-năs′-sĕh, av familjunum hjá sonunum hjá Jóseph*i*, komu nær, og talaðu frammi fyri Mósesi, og frammi fyri prinsunum, hinum fremstu fedrum Ísraels barna:

2 Og teir søgdu, HARRIN bjóðaði harra mínum at geva landið til arvs við lut*akast*i til Ísraels barna: og mín harri varð áboðin av HARRANUM at geva arvin hjá Zê-lōph′-ĕ-hăd-i, bróður várum, innat døtrum hans.

3 Og um tær verði giftar við nøkrum av sonunum hjá *hīnum* ættargreinunum av Ísraels børnum, tá skal teirra arvur verða tikin frá arvi fedra vára, og skal verða lagdur til arvin hjá tí ættargreinini, hvarat tær eru móttiknar: soleiðis skal hann verða tikin frá luti arvs okkara.

4 Og tá ið jū-bī-læ′-ŭm-ið hjá Ísraels børnum skal verða, tá skal teirra arvur verða lagdur *aftur*at arvinum hjá tí ættargreinini, hvarat tær eru móttiknar: soleiðis skal teirra arvur verða tikin burtur frá arvi ættargreinar fedra vára.

5 Og Móses ábjóðaði Ísraels børnum samsvarandi við orð HARRANS, sigandi, Ættargrein sona Jóseph*s* hevur sagt væl.

6 Hetta *er* tað tingið sum HARRIN ábýður viðvíkjandi Zê-lōph′-ĕ-hăd-s døtrum, sigandi, Latið tær giftast við hvørjum tær haldi best; einans til familju ættargreinar faðirs síns skulu tær giftast.

7 Soleiðis skal ikki arvur Ísraels barna burtflyta frá ættargrein til ættargrein: tí at hvør *og* ēin av Ísraels børnum skal halda seg til arvin hjá ættargrein fedra sína.

8 Og hvør dóttir, sum ognast arv í nakrari ættargrein Ísraels barna, skal vera kona at ēinari av familjum ættargreinar faðirs síns, at Ísraels børn mega njóta hvør maður arv fedra sína.

9 Eiheldur skal arvurin burtflyta frá *ēinari* ættargrein til aðra

ættargrein; men hvør *og* ēin av ættargreinum Ísraels barna skal halda seg til egna arv sín.

10 Enntá sum HARRIN skipaði Mósesi, soleiðis gjørdu døtur Zê-lōph´-ē-hăd-s:

11 Tí at Mâh´-lăh, Tĭr´-zăh, og Hōg´-lăh, og Mĭl´-câh, og Noah, døtur Zê-lōph´-ē-hăd-s, vórðu giftar sonum brøðra faðirs síns:

12 *Og* tær vórðu giftar inn í familjurnar hjá sonum Mă-năs´-sĕh, sonar Jóseph̲s, og teirra arvur varð verandi í ættargrein familju faðirs teirra.

13 Hesi *eru* boðini og dómarnir, sum HARRIN ábjóðaði Ísraels børnum viðˆ hendi Móse á slættum Móabs við Jordan *nær* Jeric̲ho.

HIN FIMTA BÓK MÓSESAR, KALLAÐ DEVTERONOMION.

KAPITUL 1

HESI *veri* orðini, sum Móses talaði við allan Ísrael hesumegin Jordan í oyðuni, á slættanum yvir av Reyða-*hav*inum, ímillum Pár´-ăn, Tŏ´-phĕl, og Lában, og Há´-zĕ-rōth, og Dĭ´-zā-hăb.

2 (*Tað eru* ellivu daga *ferð* frá Hór´-ĕb eftir vegi Sē´-ĭr fjalls at Ká´-dĕsj-băr-nē´-ă.)

3 Og tað bar á í tí fjørutiunda árinum, í tí ellivta mánaðinum, á hinum fyrsta *degi* mánaðarins, *at* Móses talaði við børn Ísraels, samsvarandi øllum sum HARRIN hevði givið honum í ábjóðing at teimum;

4 Eftir *at* hann hevði vigið Sĭ´-hŏn, kong Amoritanna, sum dvaldist í Hĕsj´-bŏn, og Ōg, kong Bá´-sjăn-s, sum dvaldist við Ăs´-tā-rōth í Ēd´-rē-ī:

5 Hesumegin Jordan, í landi Móabs, byrjaði Móses at kunngera hesa lóg, sigandi,

6 HARRIN Guð okkara talaði við okkum á Hór´-ĕb, sigandi, Tit hava dvalst nóg leingi á hesum fjalli:

7 Vendið tykkum, og takið ferð tykkara, og farið til fjalls Amoritanna, og at øllum *plássunum* í nánd harat, á slættanum, á heyggjunum, og í dalinum, og í sunnan, og við sævarsíðuna, til lands Cānaanitanna, og at Lĭ´-bă-nōn, at ánni miklu, ánni Ĕv-p̲hrā´-tēs.

8 Sí, eg havi lagt landið frammi fyri tykkum: farið inn og ognist landið, hvørt HARRIN svór at tykkara fedrum, Ábrahami, Ísaaki, og Jákobi, at geva innat teimum og til sáðs teirra eftir teir.

9 ¶ Og eg talaði við tykkum á teirri tíð, sigandi, Eg eri ikki førur fyri at bera tykkum sjálvur aleinaur:

10 HARRIN Guð tykkara hevur margfaldað tykkum, og sí, tit *eru* henda dag sum stjørnur himins í fjøldleika.

11 (HARRIN Guð fedra tykkara geri tykkum eitt túsund ferðir so mangar fleiri sum tit *eru,* og vælsigni tykkum, eins og hann hevur fyrijáttað tykkum!)

12 Hvussu kann eg sjálvur aleinaur bera tykkara mótburð, og tykkara byrðu, og tykkara stríð?

13 Takið tykkum vísar menn, og fatandi, og kendar millum ættargreinir tykkara, og eg vil gera teir *til* stjórnarar yvir tykkum.

14 Og tit svaraðu mær, og

søgdu, Tað tingið, sum tú hevurt talað, *er* gott *hjá okkum* at gera.

15 So eg tók teir fremstu av ættargreinum tykkara, vísar menn, og kendar, og gjørdi teir *til* odda-*menn* yvir tykkum, høvuðsmenn yvir túsundum, og høvuðsmenn yvir hundraðum, og høvuðsmenn yvir fimtium, og høvuðsmenn yvir tíggjum, og yvirmenn millum ættargreinir tykkara.

16 Og eg álegði tykkara dómarum á teirri tíð, sigandi, Hoyrið *málini* ímillum brøður tykkara, og dømið rættvísliga ímillum *hvønn* mann og bróður hansara, og hin fremmanda *sum er* hjá honum.

17 Tit skulu ikki meta persónar í dómi; *men* tit skulu hoyra hin smáa so væl sum hin mikla; tit skulu ikki vera ræddir fyri andlitinum á manni; tí at dómurin *er* Guðs: og tað málið sum er ov torført hjá tykkum, førið *tað* at mær, og eg vil hoyra tað.

18 Og eg ábjóðaði tykkum á teirri tíð allar teir lutir, sum tit skuldu gera.

19 ¶ Og tá ið vit fóru avstað frá Hór-ëb, fóru vit ígjøgnum alla hasa miklu og øgiligu oyðuna, sum tit sóu eftir vegi Amorita fjallsins, eins og HARRIN Guð okkara beyð okkum; og vit komu til Ká-dësj-băr-nē-ă.

20 Og eg segði við tykkum, Tit eru komnir at fjalli Amoritanna, sum HARRIN Guð okkara gevur okkum.

21 Sí, HARRIN tín Guð hevur lagt landið frammi fyri tær: far niðan *og tak tað* til ognar, eins og HARRIN Guð fedra tína hevur sagt við teg; óttast ikki, eiheldur ver mismótigur.

22 ¶ Og tit komu nær at mær hvør *og* ëin av tykkum, og søgdu, Vit vilja senda menn undan okkum, og teir skulu kanna okkum út landið, og bera okkum orð aftur, eftir hvørjum vegi vit mugu fara niðan, og inn í hvørjar staðir vit skulu koma.

23 Og framsøgnin hóvaði mær væl: og eg tók tólv menn av tykkum, ëin úr eini ættargrein:

24 Og teir vendu og fóru niðan á fjallið, og komu at dali Ësj-cŏl-s, og kannaðu hann út.

25 Og teir tóku av ávøksti landsins í sínum hondum, og komu við *honum* oman at okkum, og bóru okkum orð aftur, og søgdu, *Tað er* eitt gott land, sum HARRIN Guð okkara gevur okkum.

26 Hóast hetta, tit vildu ei fara niðan, men gjørdu uppreist ímóti ábjóðan HARRANS Guðs tykkara:

27 Og tit meylaðu í tjøldum tykkara, og søgdu, Av tí at HARRIN hataði okkum, hevur hann ført okkum fram út úr Egyptalandi, at flýggja okkum inn í hond Amoritanna, til at oyðileggja okkum.

28 Hvagar skulu vit fara niðan? okkara brøður hava mismótiggjørt okkara hjarta, sigandi, Fólkið *er* størri og hægri enn vit; staðirnir *eru* miklir og múraðir upp til himins; og harafturat hava vit sæð synirnar hjá Anakimunum har.

29 Tá segði eg við tykkum, Ønskrist ikki, eiheldur verið ræddir fyri teimum.

30 HARRIN Guð tykkara, sum fer undan tykkum, hann skal berjast fyri tykkum, samsvarandi við alt sum hann gjørdi fyri tykkum í Egyptalandi frammi fyri eygum tykkara;

31 Og í oyðuni, har tú hevurt sæð hvussu ið HARRIN tín Guð bar teg, sum ein maður ber son sín, á øllum veginum sum tit fóru, inntil tit komu inn í hetta plássið.

32 Tó í hesum tingi trúðu tit ikki HARRANUM Guði tykkara,

33 Sum fór á veginum undan tykkum, til at kanna tykkum út eitt pláss at sláa upp tykkara tjøld

í, í eldi um nátt*ina,* til at sýna tykkum eftir hvørjum vegi tit skuldu fara, og í einum skýggi um dag*in*.

34 Og HARRIN hoyrdi røddina av orðum tykkara, og varð vreiður, og svór, sigandi,

35 Vissuliga, tað skal ikki ēin av hesum monnunum av hesi illu ætt síggja hatta góða landið, sum eg svór at geva fedrum tykkara,

36 Uttan Caleb Jē´-phŭn-nēh sonur; hann skal síggja tað, og til hansara vil eg geva tað landið sum hann hevur traðkað uppá, og til barna hansara, av tí at hann hevur heil*veg*is fylgt HARRANUM.

37 Eisini varð HARRIN firtin við meg fyri tykkara sakir, sigandi, Tú eisini skalt ikki fara inn hagar.

38 *Men* Josjua Nuns sonur, sum stendur frammi fyri tær, hann skal fara inn hagar: legg mót í hann: tí at hann skal elva Ísrael at arva tað.

39 Harafturat hini smáu tykkara, sum tit søgdu skuldu verða ein bráð, og tykkara børn, sum á tí degi høvdu ongan kunnleika ímillum gott og ilt, tey skulu fara inn hagar, og teimum vil eg geva tað, og tey skulu ognast tað.

40 Men *hvat* tykkum *viðvíkur,* vendið tit, og takið tykkara ferð inn í oyðuna eftir vegi Reyðahavsins.

41 Tá svaraðu tit og søgdu við meg, Vit hava syndað ímóti HARRANUM, vit vilja fara niðan og berjast, samsvarandi við alt sum HARRIN Guð okkara beyð okkum. Og tá ið tit høvdu girt á hvør maður síni stríðsvápn, vóru tit tilreiðar at fara niðan á heyggin.

42 Og HARRIN segði við meg, Sig við teir, Farið ikki niðan, eisheldur berjist; tí at eg *eri* ikki tykkara millum; at ikki tit verði slignir frammi fyri tykkara fíggindum.

43 So eg talaði við tykkum; og tit vildu ikki hoyra, men gjørdu uppreist ímóti ábjóðan HARRANS, og fóru framførnisligani *niðan* á heyggin.

44 Og Amoritarnir, sum dvaldust á tí fjallinum, komu út ímóti tykkum, og eltu tykkum, eins og býflugur gera, og oyddu tykkum í Sē´-ir, *alt* at Hŏr´-māh.

45 Og tit vendu aftur og grótu frammi fyri HARRANUM; men HARRIN vildi ikki geva gætur eftir rødd tykkara, ella læna oyra at tykkum.

46 So tit vórðu *verandi* í Ká´dēsj mangar dagar, samsvarandi við dagarnar sum tit vórðu *verandi har.*

KAPITUL 2

TÁ vendu vit, og tóku ferð okkara inn í oyðuna eftir vegi Reyða-havsins, eins og HARRIN talaði við meg: og vit kringfóru Sē´-ir fjall mangar dagar.

2 Og HARRIN talaði við meg, sigandi,

3 Tit hava kringfarið hetta fjall nóg leingi: vendið tykkum norðureftir.

4 Og bjóða tú fólkinum, sigandi, Tit *eiga* at fara ígjøgnum breddan hjá tykkara bróðrum Esavs børnum, sum dvøljast í Sē´-ir; og teir skulu verða ræddir fyri tykkum: gevið tit væl gætur eftir tykkum sjálvum tessvegna:

5 Havið ikki við teir at gera; tí at eg vil ikki geva tykkum av teirra landi, nei, ikki so mikið sum eina fótbreidd; av tí at eg havi givið Sē´-ir fjall innat Esavi *til* eina ogn.

6 Tit skulu keypa mat av teimum fyri pening, at tit mega eta; og tit skulu eisini keypa vatn av teimum fyri pening, at tit mega drekka.

7 Tí at HARRIN tín Guð hevur vælsignað teg í øllum verkum handa tína: hann kennir tína ganging ígjøgnum hesa miklu oyðu: hesi fjøruti ár *hevur*

HARRIN tín Guð *verið* við tær;
tær hevur einkið trotið.
8 Og tá ið vit fóru framvið frá
okkara bróðrum Esavs børnum,
sum dvaldust í Sē´-īr, ígjøgnum
veg slættarins frá Ē´-lăth, og frá
Ē´-zĭ-ŏn-gā´-bĕr, vendu vit og fóru
eftir vegi Móabs oyðu.
9 Og HARRIN segði við meg,
Nív ikki Móabitarnar, eiheldur
berst við teir í bardaga: tí at eg
vil ikki geva tær av teirra landi *til*
eina ogn; av tí at eg havi givið Ár
innat Lots børnum *til* eina ogn.
10 Ê-mĭm´-arnir dvaldust harí í
lidnum tíðum, eitt fólk mikið, og
mangir, og høgir, eins og Ának-
imarnir;
11 Sum eisini vórðu roknaðir
risar, eins og Ánakimarnir; men
Móabitarnir kalla teir Ê-mĭm´-ar.
12 Hôr-ĭm´-arnir eisini dvaldust
í Sē´-īr áðurfyrr; men Esavs børn
avloystu teir, tá ið teir høvdu oytt
teir undan sær, og dvaldust í teir-
ra stað; eins og Ísrael gjørdi *við*
landið av síni ogn, sum HARRIN
gav teimum.
13 Nú, rísið upp, *segði eg*, og
sleppið tykkum yvirum løkin Zē´-
rēd. Og vit fóru yvirum løkin Zē´-
rēd.
14 Og tað skeiðið, í hvørjum vit
komu frá Ká´-dĕsj-băr-nē´-ů, inntil
vit vóru komnir yvirum løkin Zē´-
rēd, *var* tríati og átta ár; inntil øll
ættin av krígsmonnunum vóru
tærdir út burturúr herliðinum,
eins og HARRIN svór teimum.
15 Tí at veruliga var hond
HARRANS ímóti teimum, til at
oyða teir burturúr herliðinum,
inntil teir vóru upptærdir.
16 ¶ So tað bar á, tá ið allir
krígsmenninir vóru upptærdir og
deyðir burturúr fólkinum,
17 At HARRIN talaði við meg,
sigandi,
18 Tú verðurt at fara yvir
ígjøgnum Ár, bredda Móabs,
henda dag:
19 Og *tá ið* tú kemurt nær yvir
av Ammons børnum, nív teir ikki,
ella hav við teir at gera: tí at eg
vil ikki geva tær av landi Ammons
barna *nakra* ogn; av tí at eg havi
givið tað innat Lots børnum *til*
eina ogn.
20 (Tað eisini varð roknað eitt
land av risum: risar dvaldust harí
í gamlari tíð; og Ammonitarnir
kalla teir Zăm-zŭm-mĭm´-ar;
21 Eitt fólk mikið, og mangir,
og høgir, sum Ánakimarnir; men
HARRIN oyddi teir frammi fyri
teimum; og teir avloystu teir, og
dvaldust í teirra stað:
22 Eins og hann gjørdi við
børn Esavs, sum dvaldust í Sē´-
īr, tá ið hann oyddi Hôr-ĭm´-arnar
frammanfyri teimum ífrá; og teir
avloystu teir, og búðu í teirra stað
alt at hesum degi:
23 Og Ă-vĭm´-arnir, sum dvaldust
í Hă-zē´-rĭm, *alt* at Azzah, Căph-
tŏ-rĭm´-arnir, sum komu fram út
úr Căph´-tôr, oyddu teir, og dvald-
ust í teirra stað.)
24 ¶ Rísið tit upp, takið ferð
tykkara, og farið yvirum ánna
Arnon: sí, eg havi givið inn í
hond tína Sī´-hŏn Amorita, kong
av Hĕsj´-bŏn, og land hansara:
byrja at ognast *tað*, og berst við
hann í bardaga.
25 Henda dag vil eg byrja at
leggja ønskurin fyri tær og ótt-
an fyri tær uppá tjóðirnar *sum*
eru undir øllum himninum, sum
skulu hoyra ummæli um teg,
og skulu skelva, og vera í angist
uppá grund av tær.
26 ¶ Og eg sendi boðberar út
úr Kē´-dē-mōth-s oyðu at Sī´-hŏn-i
kongi av Hĕsj´-bŏn við friðarorð-
um, sigandi,
27 Lat meg fara ígjøgnum
land títt: eg vil fara frameftir eft-
ir høvuðsveginum, eg vil hvørki
venda til hinnar høgru handar
ella til hinnar vinstru.
28 Tú skalt selja mær mat fyri

pening, at eg má eta; og geva mær vatn fyri pening, at eg má drekka: einans eg vil fara ígjøgnum á fótum mínum;

29 (Eins og børn Esavs sum dvøljast í Sē´-ir, og Móabitarnir sum dvøljast í Ár, gjørdu mær;) inntil eg skal fara yvirum Jordan inn í landið sum HARRIN Guð okkara gevur okkum.

30 Men Sī´-hŏn kongur av Hĕsj´-bŏn vildi ikki lata okkum fara framvið sær: tí at HARRIN tín Guð herdi anda hansara, og gjørdi hjarta hansara treiskt, at hann mátti flýggja hann inn í hond tína, eins og *birtist* henda dag.

31 Og HARRIN segði við meg, Sí, eg eri byrjaður at geva Sī´-hŏn og land hansara frammi fyri tær: byrja at ognast, at tú mást arva land hansara.

32 Tá kom Sī´-hŏn út ímóti okkum, hann og alt hansara fólk, at berjast í Já´-hăz.

33 Og HARRIN Guð okkara flýggjaði hann frammi fyri okkum; og vit slógu hann, og synir hansara, og alt fólk hansara.

34 Og vit tóku allar hansara staðir á teirri tíð, og aldeilis oyddu menninar, og kvinnurnar, og hini smáu, hjá hvørjum staði, vit eftirlótu ongan til at verða eftir:

35 Einans fenaðin tóku vit til ein herfong at okkum sjálvum, og ránsfæið av staðunum sum vit tóku.

36 Frá Á´-rŏ-ĕr, sum *er* við áarbakka Arnons, og *frá* staðinum sum *er* við ánna, enntá at Gilead, var tað ikki ēin staður ov sterkur hjá okkum: HARRIN Guð okkara flýggjaði alt innat okkum:

37 Einans at landi Ammons barna komst tú ikki, *ella* at nøkrum plássi Jăb´-bŏk-s áar, ella at staðunum í fjøllunum, ella at hvørjumsumhelst *ið* HARRIN Guð okkara sýtti okkum.

KAPITUL 3

TÁ vendu vit, og fóru niðan vegin til Bá´-sjăn: og Ōg, kongur Bá´-sjăns, kom út ímóti okkum, hann og alt hansara fólk, til orrustu í Ĕd´-rĕ-ī.

2 Og HARRIN segði við meg, Óttast hann ikki: tí at eg vil flýggja hann, og alt hansara fólk, og hansara land, inn í hond tína; og tú skalt gera innat honum eins og tú gjørdirt at Sī´-hŏn-i Amorita kongi, sum dvaldist í Hĕsj´-bŏn.

3 So HARRIN Guð okkara flýggjaði inn í okkara hendur Ōg eisini, kong Bá´-sjăn-s, og alt hansara fólk: og vit slógu hann, inntil eingin var eftir hjá honum eftirverandi.

4 Og vit tóku allar hansara staðir á teirri tíð, tað var ikki ein staður sum vit tóku ikki frá teimum, trísinstjúgu staðir, alt umráði Ar´-gŏb-s, kongadømi Ōgs í Bá´-sjăn.

5 Allir hesir staðirnir *vóru* girdir við høgum múrum, portrum, og stongum; umframt ómúraðar býir fjølmangar.

6 Og vit fullkomiliga oyddu teir, eins og vit gjørdu at Sī´-hŏn-i kongi av Hĕsj´-bŏn, fullkomiliga oyðandi menninar, kvinnur*nar,* og børn*ini,* hjá hvørjum staði.

7 Men allan fenaðin, og fongin av staðunum, tóku vit til ein herfong til okkara sjálvs.

8 Og vit tóku á teirri tíð út úr hondini á teimum tveimum kongunum hjá Amoritunum landið sum *var* hesumegin Jordan, frá ánni Arnon at Hermon fjalli;

9 (*Hvørt* Hermon Sī-dō´-nĭ-ararnir kalla Sī´-rī-ŏn; og Amoritarnir kalla tað Sjē´-nīr;)

10 Allar staðir slættarins, og alt Gilead, og alt Bá´-sjăn, at Săl´-chăh og Ĕd´-rĕ-ī, staðir av kongadømi Ōgs í Bá´-sjăn.

11 Tí at einans Ōg kongur av

Bá´-sjăn varð verandi av leivdini av risum; sí, hansara seingjarstað *var* eitt seingjarstað av jarni; *er* tað ikki í Răb´-băth Ammons barna? níggju alnir *var* longdin hará, og fýra alnir breiddin á tí, eftir alnini hjá einum manni.

12 Og hetta land, *sum* vit ognaðust á teirri tíðini, frá Á´-rō-ēr, sum *er* við ánna Arnon, og hálvt Gilead fjall, og staðirnar harav, gav eg Reûbenitunum og til Gáditanna.

13 Og restina av Gilead, og alt Bá´-sjăn, *sum er* kongadømi Ogs, gav eg at hálvu ættargrein Mă-năs´-sēh; alt umráði Âr´-gŏb-s, við øllum Bá´-sjăn, sum varð kallað landið hjá risum.

14 Já´-īr Mă-năs´-sēh sonur tók alt land Âr´-gŏb-s at breddum Gĕ-sjū´-rī-s og Má-ăch´-ā-thī-s; og kallaði teir eftir sínum egna navni, Bá´-sjăn-há´-vōth-já´-īr, at hesum degi.

15 Og eg gav Má´-chīr-i Gilead.

16 Og Reûbenitunum og Gáditunum gav eg frá Gilead enntá at ánni Arnon hálvan dalin, og landamarkið enntá at ánni Jăb´-bŏk, *sum er* landamark Ammons barna;

17 Slættan eisini, og Jordan, og breddan *harav,* frá Chĭn´-nĕ-rĕth enntá at sjógvi slættarins, *enntá* salta sjógvin, undir Âsj´-dŏth-pīs´-găh eystanvert.

18 ¶ Og eg ábjóðaði tykkum á teirri tíð, sigandi, HARRIN Guð tykkara hevur givið tykkum hetta land til at ognast tað: tit skulu fara yvirum vígbúnir frammanfyri tykkara brøðrum Ísraels børnum, allir *sum eru* hóskiligir til kríggið.

19 Men konur tykkara, og hini smáu tykkara, og fenaður tykkara, (*tí* eg veit, at tit hava nógvan fenað,) skulu verða í staðum tykkara, sum eg havi givið tykkum;

20 Inntil HARRIN havi givið hvílu innat brøðrum tykkara, so væl sum innat tykkum, og *inntil* teir eisini ogni *sær* landið sum HARRIN tykkara Guð hevur givið teimum handan Jordan: og *so* skulu tit venda aftur hvør maður at ogn síni, sum eg havi givið tykkum.

21 ¶ Og eg ábjóðaði Josjua á teirri tíð, sigandi, Tíni eygu hava sæð alt sum HARRIN Guð tykkara hevur gjørt hesum tveimum kongunum: soleiðis skal HARRIN gera øllum teimum kongadømunum, hvagar tú fert framvið.

22 Tit skulu ikki óttast teir: tí at HARRIN Guð tykkara, hann skal berjast fyri tykkum.

23 Og eg bønaði HARRAN á teirri tíð, sigandi,

24 O Harri GUÐ, tú ert farin undir at sýna tænara tínum mikilleika tín, og tína mektigu hond: tí at hvør Guð *er tað* í himni ella á jørð, sum kann gera samsvarandi við verkini hjá tær, og samsvarandi við megina hjá tær?

25 Eg biði teg, lat meg fara yvirum, og síggja tað góða landið sum *er* handan Jordan, hatta frálíka fjall, og Lī´-bă-nŏn.

26 Men HARRIN var vreiður við meg fyri tykkara sakir, og vildi ikki hoyra meg: og HARRIN segði við meg, Lat tað vera tær nóg mikið; tala ikki meira við meg um hetta mál.

27 Slepp tær niðan á toppin av Pīs´-găh, og lyft upp eygum tínum vestureftir, og norðureftir, og suðureftir, og eystureftir, og skoða *tað* við eygum tínum: tí at tú skalt ikki fara yvirum hesa Jordan.

28 Men álegg Josjua, og legg mót í hann, og styrk hann: tí at hann skal fara yvirum frammanfyri hesum fólkinum, og hann skal elva teimum at arva landið sum tú skalt síggja.

29 So vit dvaldu í dalinum yvir av Bĕth-pē´-ôr.

KAPITUL 4

NÚ tessvegna, gev gætur, O Ísrael, at ásetingunum og at dómunum, sum eg læri tykkum, fyri at gera *tey,* at tit mega liva, og fara inn og ognast landið sum HARRIN Guð fedra tykkara gevur tykkum.

2 Tit skulu ikki leggja afturat orðinum sum eg ábjóði tykkum, eiheldur skulu tit skerja *nakað* frá tí, at tit mega halda boðini hjá HARRANUM Guði tykkara sum eg ábjóði tykkum.

3 Tykkar eygu hava sæð hvat HARRIN gjørdi uppá grund av Bā´-ăl-pē´-ôr-i: tí at allar menninar sum fylgdu Bā´-ăl-pē´-ôr-i, HARRIN Guð tín hevur oytt teir tykkara millum ífrá.

4 Men tit, sum krøktust at HARRANUM Guði tykkara, *eru* á lívi hvør *og* ēin av tykkum henda dag.

5 Sí, eg havi lært tykkum ásetingar og dómar, enntá sum HARRIN Guð mín ábeyð mær, at tit skuldu gera soleiðis í landinum, hvagar tit fara at ognast tað.

6 Haldið tessvegna og gerið *tey;* tí at hetta *er* tykkara vísdómur og tykkara skil í eygsjónini á tjóðunum, sum skulu hoyra allar hesar ásetingarnar, og siga, Vissuliga, henda mikla tjóð *er* eitt víst og skiljandi fólk.

7 Tí at hvør tjóð *er tað so* mikil, sum *hevur* Guð *so* nær at teimum, sum HARRIN Guð vár *er* í øllum *lutum sum* vit kalla uppá hann *fyri?*

8 Og hvør tjóð *er tað so* mikil, sum hevur ásetingar og dómar *so* rættvísar sum øll henda lóg, sum eg seti framfyri tykkum henda dag?

9 Einans gev gætur um teg sjálvan, og varðveit tína sál ídnisliga, at ikki tú gloymi teir lutir sum tíni eygu hava sæð, og at ikki teir fari burt frá tínum hjarta allar dagar lívs tíns: men frálær teir sonum tínum, og sonasonum tínum;

10 *Serstakliga* dagin sum tú stóðst frammi fyri HARRANUM Guði tínum á Hór´-ēb, tá ið HARRIN segði við meg, Savna mær fólkið saman, og eg vil fáa tey *at* hoyra orðini hjá mær, at tey mega læra at óttast meg allar dagarnar sum tey skulu liva uppiá jørðini, og *at* tey mega frálæra børnum sínum.

11 Og tit komu nær og stóðu undir fjallinum; og fjallið brann við eldi at miðjum himni, við myrkri, skýggjum, og tjúkkum myrkri.

12 Og HARRIN talaði við tykkum út úr miðjum eldinum: tit hoyrdu røddina á orðunum, men sóu onga líksemi; einans *tit hoyrdu* eina rødd.

13 Og hann kunngjørdi tykkum sáttmála sín, sum hann skipaði tykkum at útinna, *enntá* tíggju boð; og hann skrivaði tey uppá tvær talvur av steini.

14 ¶ Og HARRIN ábjóðaði mær á teirri tíð at frálæra tykkum ásetingar og dómar, at tit máttu gera tey í landinum, hvagar tit fara yvir at ognast tað.

15 Gevið tit tessvegna væl gætur um tykkum sjálvar; tí at tit sóu einkið háttarlag av líksemi á tí degi *sum* HARRIN talaði við tykkum á Hór´-ēb út úr miðjum eldinum:

16 At ikki tit spilli *tykkum sjálvar,* og geri tykkum eina rista mynd, líksemina á nøkrum skapi, líkleikan á kallkyni ella kvennkyni,

17 Líkleikan á nøkrum djóri sum *er* á jørðini, líkleikan á nøkrum veingjaðum fugli sum flýgur í luftini,

18 Líkleikan á nøkrum tingi sum skríður á jørðini, líkleikan á

nøkrum fiski sum *er* í vøtnunum undir jørðini:

19 Og at ikki tú lyfti upp eygum tínum at himni, og tá ið tú sært sólina, og mánan, og stjørnurnar, *enntá* allan her himins, skuldirt verðið drivin til at tilbiðja tey, og tæna teimum, sum HARRIN tín Guð hevur sundurskift øllum tjóðum undir øllum himninum.

20 Men HARRIN hevur tikið tykkum, og ført tykkum fram út úr jarn bræðsluovninum, *enntá* út úr Egyptalandi, at vera honum eitt arvs fólk, sum *tit eru* henda dag.

21 Ennvíðari var HARRIN firtin við meg fyri tykkara sakir, og svór, at eg skuldi ikki fara yvirum Jordan, og at eg skuldi ikki fara inn at hasum góða landi, sum HARRIN tín Guð gevur tær *til* ein arv:

22 Men eg má doyggja í hesum landinum, eg má ikki fara yvirum Jordan: men tit skulu fara yvirum, og ognast hatta góða landið.

23 Gevið gætur um tykkum sjálvar, at ikki tit gloymi sáttmálan hjá HARRANUM Guði tykkara, sum hann gjørdi við tykkum, og geri tykkum eina rista mynd, *ella* líkleikan á nøkrum *tingi,* sum HARRIN tín Guð hevur sýtt tær.

24 Tí at HARRIN tín Guð *er* ein upptærandi eldur, *enntá* ein ástbrellin Guð.

25 ¶ Tá ið tú skalt gita børn, og barnabørn, og tit skulu hava verðið verandi leingi í landinum, og skulu spilla *tykkum,* og gera eina rista mynd, *ella* líksemina á nøkrum *tingi,* og skulu gera ilt í eygsjón HARRANS Guðs tíns, at tirra hann til firtnis:

26 Eg kalli himin og jørð til vitnis ímóti tykkum henda dag, at tit skulu skjótt fullkomiliga týnast oman av landinum, hvarat tit fara yvirum Jordan at ognast tað; tit skulu ikki framleingja *tykkara* dagar uppiá tí, men skulu fullkomiliga verða oyddir.

27 Og HARRIN skal spjaða tykkum millum tjóðirnar, og tit skulu vera eftir fáir í tali millum hinar heidnu, hvagar HARRIN skal leiða tykkum.

28 Og har skulu tit tæna gudum, verkinum av mannahondum, viði og steini, sum hvørki síggja, ella hoyra, ella eta, ella lukta.

29 Men um haðani frá tú skalt søkja HARRAN Guð tín, tú skalt finna *hann,* um tú søki hann við øllum hjarta tínum og við allari sál tíni.

30 Tá ið tú ert í trongd, og øll hesi ting eru komin uppá teg, *enntá* í hinum seinnu døgunum, um tú vendi til HARRANS Guðs tíns, og skalt vera lýðin rødd hansara;

31 (Tí at HARRIN tín Guð *er* ein miskunnarfullur Guð;) hann vil ikki yvirgeva teg, eiheldur oyða teg, ella gloyma sáttmálan hjá fedrum tínum sum hann svór teimum.

32 Tí at spyr nú um dagarnar sum eru umlidnir, sum vóru undan tær, síðan tann dag sum Guð skapaði mann uppiá jørðini, og *spyr* frá tí ēinu síðuni av himni at hīnari, hvørt tað hevur verið *nakað slíkt ting* eins og hetta mikla tingið *er,* ella hevur verðið hoyrt líka *sum* tað?

33 Hoyrdi *nakrantíð* fólk Guðs rødd talandi út úr miðjum eldinum, sum tú hevurt hoyrt, og livdi?

34 Ella hevur Guð kannað at farið *og* tikið sær eina tjóð frá miðjuni av *eini aðrari* tjóð, viðˆ freistingum, viðˆ teknum, og viðˆ undrum, og viðˆ kríggi, og viðˆ eini mektigari hond, og viðˆ einum útstrektum armi, og viðˆ miklum ræðslum, samsvarandi við alt sum HARRIN Guð tykkara gjørdi

fyri tykkum í Egyptalandi frammi fyri eygum tykkara?

35 Innat tær varð tað sýnt, at tú máttirt vita, at HARRIN, hann *er* Guð; *tað er* eingin annar umframt hann.

36 Út úr himni fekk hann teg at hoyra sína rødd, at hann mátti leiðbeina teg: og uppiá jørð sýndi hann tær sín mikla eld; og tú hoyrdirt orðini hjá honum út úr miðjum eldinum.

37 Og av tí at hann elskaði fedrar tínar, tí valdi hann teirra sáð eftir teir, og førdi teg út í eygsjón síni við síni mektigu kraft út úr Egyptalandi;

38 Til at reka út tjóðir frammi undan tær, miklari og mektigari enn tú *ert,* til at føra teg inn, til at geva tær teirra land *til* ein arv, sum *tað er* henda dag.

39 Vita tessvegna henda dag, og umhugsa *tað* í hjarta tínum, at HARRIN, hann *er* Guð í himni í erva, og uppiá jørðini í neðra: *tað er* eingin annar.

40 Tú skalt halda, tessvegna, hans ásetingar, og boðini hjá honum, sum eg ábjóði tær henda dag, at tað má ganga væl við tær, og við børnum tínum eftir teg, og at tú mást framleingja *tínar* dagar uppiá jørðini, sum HARRIN Guð tín gevur tær, um ævir.

41 ¶ Tá atskildi Móses tríggjar staðir hesumegin Jordan ímóti sólarrisinum;

42 At bana*maður*in mátti flýggja hagar, sum skuldi dripið sín næsta óvarugt, og hataði hann ikki í umlidnum tíðum; og at, flýggjandi at ēinum av hesum staðunum, hann mátti liva:

43 *Nevniliga,* Bē´-zĕr í oyðuni, í slættlendinum, hjá Reûbenitunum; og Rá´-möth í Gilead, hjá Gáditunum; og Gō´-lăn í Bá´-sjăn, hjá Mă-năs-sīt´-unum.

44 ¶ Og hetta *er* lógin sum Móses setti framfyri børn Ísraels:

45 Hetta *eru* vitnisburðirnir, og ásetingarnar, og dómarnir, sum Móses talaði við børn Ísraels, eftir *at* teir komu fram út úr Egyptalandi,

46 Hesumegin Jordan, í dalinum yvir av Bĕth-pē´-ôr, í landi Sī´-hŏn-s Amorita kongs, hvør dvaldist í Hĕsj´-bŏn, hvønn Móses og børn Ísraels slógu, eftir *at* teir vóru komnir fram út úr Egyptalandi:

47 Og teir *tóku* til ognar land hansara, og land Ōgs kongs av Bá´-sjăn, tveir kongar hjá Amoritunum, sum *vóru* hesumegin Jordan ímóti sólarrisinum;

48 Frá Á´-rō-ĕr, sum *er* við bakkan av ánni Arnon, enntá at Sī´-ŏn fjalli, sum *er* Hermon,

49 Og allan slættan hesumegin Jordan eystureftir, alt at sjógvi slættarins, undir lindir Pīs´-gŭh.

KAPITUL 5

OG Móses kallaði allan Ísrael, og segði við teir, Hoyr, O Ísrael, ásetingarnar og dómarnar, sum eg tali í oyru tykkara henda dag, at tit mega læra tey, og halda, og gera tey.

2 HARRIN vár Guð gjørdi ein sáttmála við okkum á Hór´-ĕb.

3 HARRIN gjørdi ikki henda sáttmála við fedrar okkara, men við okkum, *enntá* okkum, sum *eru* allir av okkum her á lívi henda dag.

4 HARRIN tosaði við tykkum andlit til andlits á fjallinum út úr miðjum eldinum,

5 (Eg stóð ímillum HARRAN og tykkum á teirri tíð, at sýna tykkum orðið hjá HARRANUM: tí at tit vóru ræddir uppá grund av eldinum, og fóru ikki niðan á fjallið;) sigandi,

6 ¶ Eg *eri* HARRIN tín Guð, sum førdi teg út úr Egyptalandi, frá trældóms-húsinum.

7 Tú skal ongar aðrar gudar hava undan mær.
8 Tú skalt ikki gera tær *nakra* rista mynd, *ella* nakran líkleika *av nøkrum tingi* sum *er* í himni í erva, ella sum *er* á jørðini í neðra, ella sum *er* í vøtnunum niðriundir jørðini:
9 Tú skalt ikki boyggja niður teg sjálvan at teimum, ella tæna teimum: tí at eg, HARRIN Guð tín, *eri* ein ástbrellin Guð, heimsøkjandi misgerð fedranna uppá børnini at hinum triðja og fjórða *ættarliðinum* hjá teimum ið hata meg,
10 Og sýnandi miskunn at túsundum av teimum sum elska meg og halda boðini hjá mær.
11 Tú skalt ikki taka navn HARRANS Guðs tíns í fáfongd: tí at HARRIN vil ikki halda *hann* sakleysan sum tekur navn hansara í fáfongd.
12 Halt sabbatsdagin til at halga hann, eins og HARRIN tín Guð hevur boðið tær.
13 Seks dagar skalt tú streva, og gera alt títt arbeiði:
14 Men hin sjeyndi dagurin *er* sabbaturin hjá HARRANUM Guði tínum: *í honum* skalt tú ikki gera nakað arbeiði, tú, ella sonur tín, ella dóttir tín, ella tænastusveinur tín, ella tænastugenta tín, ella oksi tín, ella asni tín, ella nakað av fenaði tínum, ella tín fremmandi sum *er* innanfyri portur tíni; at tín tænastusveinur og tín tænastugenta mega hvíla eins væl sum tú.
15 Og minst til, at tú vart ein tænari í Egyptalandi, og *at* HARRIN tín Guð førdi teg út haðani gjøgnum eina mektiga hond og viðˆ einum útstrektum armi: tí skipaði HARRIN tín Guð tær at halda sabbatsdagin.
16 ¶ Æra faðir tín og móður tína, eins og HARRIN tín Guð hevur áboðið tær; at tínir dagar mega verða framlongdir, og at tað má ganga væl við tær, í landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær.
17 Tú skalt ikki drepa.
18 Eiheldur skalt tú fremja hordóm.
19 Eiheldur skalt tú stjala.
20 Eiheldur skalt tú bera falskan vitnisburð ímóti næsta tínum.
21 Eiheldur skalt tú tráa ektakonu næsta tíns, eiheldur skalt tú girnast hús næsta tíns, akur hans, ella tænastumann hans, ella tænastugentu hans, oksa hans, ella asna hans, ella nakað *ting* sum næsta tíns *er*.
22 ¶ Hesi orðini talaði HARRIN við allan tykkara savnað á fjallinum út úr miðjum eldinum, skýgginum, og tí tjúkka myrkrinum, við eini miklari rødd: og hann legði aftur at ei meira. Og hann skrivaði tey í tvær talvur av steini, og flýggjaði tær at mær.
23 Og tað bar á, tá ið tit hoyrdu røddina út úr miðjum myrkrinum, (tí at fjallið brann við eldi,) at tit komu nær at mær, *enntá* øll høvdini av ættargreinum tykkara, og tykkar elstu;
24 Og tit søgdu, Sí, HARRIN vár Guð hevur sýnt okkum sína dýrd og sín mikilleika, og vit hava hoyrt hansara rødd út úr miðjum eldinum: vit hava sæð henda dag, at Guð talar við mann, og hann livir.
25 Nú tessvegna, hví skuldu vit doyð? tí hesin mikli eldurin vil upptæra okkum: um vit hoyra rødd HARRANS Guðs várs meira, so skulu vit doyggja.
26 Tí at hvør *er tað av* øllum kjøti, sum hevur hoyrt rødd hins livandi Guðs talandi út úr miðjum eldinum, eins og vit *hava*, og livað?
27 Far tú nær, og hoyr alt sum HARRIN Guð vár skal siga: og

tala tú við okkum alt sum HARRIN Guð vár skal tala við teg; og vit vilja hoyra *tað,* og gera *tað*.

28 Og HARRIN hoyrdi røddina av orðum tykkara, tá ið tit talaðu við meg; og HARRIN segði við meg, Eg havi hoyrt røddina á orðunum hjá hesum fólkinum, sum teir hava talað við teg: teir hava sagt væl alt sum teir hava talað.

29 O at tað var slíkt eitt hjarta í teimum, at teir vildu óttast meg, og hildið øll boðini hjá mær altíð, at tað mátti verið væl *statt* við teimum, og við teirra børnum um ævir!

30 Gakk *og* sig til teirra, Sleppið tykkum inn í tykkara tjøld aftur.

31 Men hvat tær viðvíkur, statt tú her hjá mær, og eg vil tala við teg øll boðini, og ásetingarnar, og dómarnar, sum tú skalt frálæra teimum, at teir mega gera *tey* í landinum sum eg gevi teimum at ognast tað.

32 Tit skulu geva ans eftir at gera, tessvegna, eins og HARRIN tykkara Guð hevur skipað tykkum: tit skulu ikki venda til viks til hinnar høgru handar ella til hinnar vinstru.

33 Tit skulu ganga í øllum vegunum sum HARRIN tykkara Guð hevur skipað tykkum, at tit mega liva, og *at tað má vera* væl *statt* við tykkum, og *at* tit mega framleingja *tykkara* dagar í landinum sum tit skulu ognast.

KAPITUL 6

NÚ, hetta *eru* boðini, ásetingarnar, og dómarnir, sum HARRIN tykkara Guð ábjóðaði at frálæra tykkum, at tit máttu gera *tey* í landinum, hvagar tit fara at ognast tað:

2 At tú máttirt óttast HARRAN Guð tín, at halda allar hans ásetingar og boðini hjá honum, sum eg ábjóði tær, tú, og sonur tín, og sonarsonur tín, allar dagar lívs tíns; og at tínir dagar mega verða framlongdir.

3 ¶ Hoyr tí, O Ísrael, og gev ans eftir at gera *tað;* at tað má vera væl *statt* við tær, og at tit mega økjast mektigani, eins og HARRIN Guð fedra tína hevur fyrijáttað tær, í landinum sum flýtur við mjólk og hunangi.

4 Hoyr, O Ísrael: HARRIN Guð vár *er* ēin HARRI:

5 Og tú skalt elska HARRAN Guð tín við øllum hjarta tínum, og við allari sál tíni, og við øllum mátti tínum.

6 Og hesi orð, sum eg ábjóði tær henda dag, skulu vera í hjarta tínum:

7 Og tú skalt frálæra tey dúgligani børnum tínum, og skalt tala um tey tá ið tú siturt í húsi tínum, og tá ið tú gongurt eftir veginum, og tá ið tú liggurt niðri, og tá ið tú rísurt upp.

8 Og tú skalt binda tey til eitt tekin uppá hond tína, og tey skulu vera sum pannubond ímillum eygu tíni.

9 Og tú skalt skriva tey uppá *dura*stavir húss tíns, og á portur tíni.

10 Og tað skal verða, tá ið HARRIN tín Guð skal hava ført teg inn í landið sum hann svór fedrum tínum, til Ábrahams, til Ísaaks, og til Jákobs, at geva tær miklar og frálíkar staðir, sum tú bygdirt ei,

11 Og hús full av øllum góðum *lutum,* sum tú fyltirt ei, og brunnar grivnar, sum tú gróvst ei, víngarðar og olivin trø, sum tú plantaðirt ei; tá ið tú skalt hava etið og vera mettur;

12 *Tá* ver varin, at ikki tú gloymi HARRAN, sum førdi teg fram út úr Egyptalandi, frá trældóms-húsinum.

13 Tú skalt óttast HARRAN Guð tín, og tæna honum, og skalt svørja við hans navn.

14 Tit skulu ikki fara eftir øðrum gudum, av gudunum hjá fólkinum sum *eru* runt umkring tykkum;
15 (Tí at HARRIN tín Guð *er* ein ástbrellin Guð tykkara millum) at ikki firtni HARRANS Guðs tíns verði kynd ímóti tær, og oyði teg oman av ásjón jarðarinnar.
16 ¶ Tit skulu ikki freista HARRAN Guð tykkara, eins og tit freistaðu *hann* í Măs´-sâh.
17 Tit skulu dúgligani halda boðini hjá HARRANUM Guði tykkara, og hansara vitnisburðir, og hans ásetingar, sum hann hevur áboðið tær.
18 Og tú skalt gera *tað sum er* rætt og gott í eygsjón HARRANS: at tað má vera væl *statt* við tær, og at tú mást fara inn og ognast tað góða landið sum HARRIN svór fedrum tínum,
19 At kasta út allar tínar fíggindar frammi undan tær, eins og HARRIN hevur talað.
20 *Og* tá ið tín sonur spyr teg í komandi tíð, sigandi, Hvat *merkja* vitnisburðarnir, og ásetingarnar, og dómarnir, sum HARRIN vár Guð hevur áboðið tykkum?
21 Tá skalt tú siga við son tín, Vit vóru trælmenn Pharaohs í Egyptalandi; og HARRIN førdi okkum út úr Egyptalandi við eini mektigari hond:
22 Og HARRIN sýndi tekinˇ og undurˇ, mikil og svár, omanyvir Egyptaland, omanyvir Pharaoh, og omanyvir alt hansara húshald, frammi fyri eygum várum:
23 Og hann førdi okkum út haðani frá, at hann mátti føra okkum inn, at geva okkum landið sum hann svór fedrum várum.
24 Og HARRIN ábjóðaði okkum at gera allar hesar ásetingar, at óttast HARRAN Guð váran, til okkara góða altíð, at hann mátti varðveita okkum á lívi, eins og *tað er* á hesum degi.
25 Og tað skal vera okkara rættvísi, um vit gevi ans eftir at gera øll hesi boðini frammi fyri HARRANUM Guði várum, eins og hann hevur áboðið okkum.

KAPITUL 7

TÁ ið HARRIN tín Guð skal føra teg inn í landið, hvagar tú fert at ognast tað, og hevur kastað út mangar tjóðir frammi fyri tær, Hittitarnar, og Gĭr-gă-sjĭt´-arnar, og Amoritarnar, og Cănaanitarnar, og Pê-rĭz-zĭt´-arnar, og Hī-vĭt´-arnar, og Jĕb-ŭ-sĭt´-arnar, sjey tjóðir miklari og mektigari enn tú;
2 Og tá ið HARRIN tín Guð skal geva tær upp frammi fyri tær; *tá* skalt tú sláa tær, *og* aldeilis oyða tær; tú skalt ongan sáttmála gera við tær, ella sýna miskunn at teimum:
3 Eiheldur skalt tú gera giftamálˇ við tær; tína dóttur skalt tú ikki geva syni hansara, eiheldur hansara dóttur skalt tú taka syni tínum.
4 Tí at tær vilja snúgva burtur syni tínum frá at fylgja mær, at teir mega tæna øðrum gudum: so vil HARRANS firtni verða kynd ímóti tykkum, og oyða teg brádliga.
5 Men svá skulu tit fara við teimum; tit skulu oyðileggja altarini hjá teimum, og bróta niður teirra myndir, og skera niður teirra lundir, og brenna teirra ristu myndir við eldi.
6 Tí at tú *ert* eitt heilagt fólk at HARRANUM Guði tínum: HARRIN tín Guð hevur útvalt teg til at vera eitt serligt fólk at sær sjálvum, uppum øll fólk sum *eru* uppiá ásjón jarðarinnar.
7 HARRIN koyrdi ikki sín kærleika uppá tykkum, ella valdi tykkum, av tí at tit vóru fleiri í tali enn nakað fólk; tí at tit *vóru* tað fæsta av øllum fólkum:

8 Men av tí at HARRIN elskaði tykkum, og av tí at hann vildi halda eiðin sum hann hevði svorið fedrum tykkara, hevur HARRIN fört tykkum út við eini mektigari hond, og endurloyst tykkum út úr trælmanna-húsinum, frá hond Pharaohs, Egyptalands kongs.

9 Vita tí, at HARRIN tín Guð, hann *er* Guð, hin trúfasti Guð, sum heldur sáttmála og miskunn við teir sum elska hann og halda hansara sáttmálar til túsund ættarliðir;

10 Og endurrindar teimum, sum hata hann, í teirra andlit, til at oyða teir: hann vil ikki vera slakkur móti honum sum hatar hann, hann vil endurgjalda honum í hansara andlit.

11 Tú skalt tí halda boðini, og ásetingarnar, og dómarnar, sum eg ábjóði tær henda dag, at gera tey.

12 ¶ Hvørsvegna tað skal bera á, um tit gevi gætur eftir hesum dómunum, og haldi, og geri teir, at HARRIN tín Guð skal halda yvirfyri tær sáttmálan og miskunnina sum hann svór innat fedrum tínum:

13 Og hann vil elska teg, og vælsigna teg, og margfalda teg: hann vil eisini vælsigna ávøkstin av móðurlívi tínum, og ávøkstin av landi tínum, korn títt, og vín títt, og olju tína, økingina av kúm tínum, og fylgini av seyði tínum, í landinum sum hann svór tínum fedrum at geva tær.

14 Tú skalt vera vælsignaður uppum øll fólk: tað skal ikki vera kallkyn ella kvennkyn ófruktbært tykkara millum, ella millum fenað tykkara.

15 Og HARRIN vil taka burtur frá tær alla sjúku, og vil koyra ongan av hinum óndu sjúkdómum Egyptalands, sum tú kennirt, uppá teg; men vil leggja teir uppá allar *teir* sum hata teg.

16 Og tú skalt upptæra øll fólkini sum HARRIN tín Guð skal flýggja tær; títt eyga skal onga samkenslu hava á teir: eiheldur skalt tú tæna gudum teirra; tí at tað *vil verða* ein snerra at tær.

17 Um tú skalt siga í hjarta tínum, Hesar tjóðirnar *eru* fleiri enn eg; hvussu kann eg gera tær ognarleysar?

18 Tú skalt ikki vera ræddur fyri teimum: *men* skalt væl minnast hvat HARRIN tín Guð gjørdi innat Pharaoh, og øllum Egyptalandi;

19 Tær miklu freistingarnar sum eygu tíni sóu, og teknini, og undrini, og hina mektigu hond, og hin útstrekta arm, við hvørjum HARRIN tín Guð førdi teg út: soleiðis skal HARRIN tín Guð gera at øllum fólkunum, fyri hvørjum tú ert ræddur.

20 Harafturat vil HARRIN tín Guð senda vespuna teirra millum, inntil teir sum eru eftir, og fjala seg fyri tær, verði oyddir.

21 Tú skalt ikki vera ræðslusligin yvirfyri teimum: tí at HARRIN tín Guð *er* tykkara millum, ein mektigur Guð og øgiligur.

22 Og HARRIN tín Guð vil koyra út tær tjóðirnar frammi fyri tær smátt um smátt: tú mást ikki upptæra tær í einum, at ikki markarinnar djór økist uppá teg.

23 Men HARRIN tín Guð skal geva tær upp innat tær, og skal oyða tær við eini mektigari oyðing, inntil tær verði oyddar.

24 Og hann skal flýggja teirra kongar inn í hond tína, og tú skalt oyða teirra navn undan himni: tað skal eingin maður vera førur fyri at standa frammi fyri tær, inntil tú havi oytt teir.

25 Tær ristu myndirnar av teirra gudum skulu tit brenna við eldi: tú skalt ikki tráa silvurið ella gullið *sum er* á teimum, ella taka *tað* at tær, at ikki tú verði snerr-

aður harí: tí at tað *er* ein andstygd fyri HARRANUM Guði tínum.

26 Eiheldur skalt tú bera eina andstygd inn í hús títt, at ikki tú verði ein bannaður lutur líka *sum* hon: *men* tær skal fullkomiliga standast við tað, og tær skal fullkomiliga stiknast við tað, tí at tað *er* ein bannaður lutur.

KAPITUL 8

ØLLUM boðunum, sum eg bjóði tær henda dag, skulu tit geva ans eftir at gera, at tit mega liva, og margfaldast, og fara inn og ognast landið sum HARRIN svór fedrum tykkara.

2 Og tú skalt minnast allan tann vegin sum HARRIN tín Guð leiddi teg hesi fjøruti ár í oyðuni, til at eyðmjúkgera teg, *og* til at royna teg, til at vita hvat *var* í hjarta tínum, hvørt tú vildirt halda boðini hjá honum, ella ikki.

3 Og hann eyðmjúkgjørdi teg, og loyvdi tær at hungra, og føddi teg við măn´-nă, sum tú kendirt ei, eiheldur kendu fedrar tínir; at hann mátti fáa teg *at* vita, at maður livir ikki av breyði eina, men av hvørjum *orði* sum útgongur út úr munni HARRANS livir maður.

4 Tín klædnaður vaks ikki gamal uppiá tær, eiheldur trútnaði tín fótur, hesi fjøruti ár.

5 Tú skalt eisini hugleiða í hjarta tínum, at eins og maður agar son sín, *soleiðis* HARRIN tín Guð agar teg.

6 Tí skalt tú halda boðini hjá HARRANUM Guði tínum, at ganga í vegum hansara, og at óttast hann.

7 Tí at HARRIN tín Guð førir teg inn í eitt gott land, eitt land av áarløkum av vatni, av keldum og dýpdum sum vella úr dølum og heyggjum;

8 Eitt land av hveiti, og byggi, og víntrøum, og fikutrøum, og granateplum; eitt land av olivinolju, og hunangi;

9 Eitt land, í hvørjum tú skalt eta breyð uttan laksemi, tær skal ikki vanta nakað *ting* í tí; eitt land, hvørs steinar *eru* jarn, og út úr hvørs heyggjum tú kanst grava messing.

10 Tá ið tú hevurt etið og ert mettur, tá skalt tú vælsigna HARRAN tín Guð fyri tað góða landið sum hann hevur givið tær.

11 Ver varin at tú gloymi ikki HARRAN tín Guð, í ikki at halda boðini hjá honum og dómarnar hjá honum, og ásetingarnar hjá honum, sum eg ábjóði tær henda dag:

12 At ikki, *tá ið* tú hevurt etið og ert mettur, og hevurt bygt frálík hús, og dvalst *harí;*

13 Og *tá ið* tíni stórfæafylgir og tíni smáfæafylgir margfaldist, og títt silvur og títt gull er margfaldað; og alt, sum tú hevurt, er margfaldað;

14 Tá títt hjarta verði lyft upp, og tú gloymi HARRAN tín Guð, sum førdi teg fram út úr Egyptalandi, frá trældóms-húsinum;

15 Hvør leiddi teg ígjøgnum hasa miklu og øgiligu oyðuna, *hvarí vóru* eldsligir høggormar, og sporðdrekar, og turkur, hvar einkið vatn *var;* hvør førdi tær fram vatn út úr tinnuklettinum;

16 Hvør føddi teg í oyðuni við măn´-nă, hvørt tínir fedrar kendu ikki, at hann mátti eyðmjúkgera teg, og at hann mátti royna teg, at gera tær gott við tín seinna enda;

17 Og tú sigi í hjarta tínum, Mín kraft og mátturin av *míni* hond hevur fingið mær hetta ríkidømi.

18 Men tú skalt minnast HARRAN Guð tín: tí at *tað er* hann sum gevur tær kraft at skaffa ríkidømi, at hann má grunda sín sáttmála sum hann svór tínum fedrum, sum *tað er* henda dag.

19 Og tað skal verða, um tú yvirhøvur gloymi HARRAN Guð tín, og gangi eftir øðrum gudum, og tæni teimum, og tilbiðji teir, eg vitni ímóti tykkum henda dag, at tit skulu vissuliga farast.

20 Eins og tjóðirnar, sum HARRIN oyðir frammi fyri andliti tykkara, soleiðis skulu tit farast; av tí at tit vildu ikki vera lýdnir rødd HARRANS Guðs tykkara.

KAPITUL 9

HOYR, O Ísrael: Tú *eigurt* at fara yvirum Jordan henda dag, at fara inn at *taka* til ognar tjóðir, miklari og mektigari enn tú sjálvur, staðir miklar og girdar upp til himins,

2 Eitt fólk mikið og hátt, børn Ánakimanna, hvørjar tú kennirt, og *um hvørjar* tú hevurt hoyrt *sagt*, Hvør kann standast frammi fyri børnum Ánaks!

3 Skiljið tessvegna henda dag, at HARRIN tín Guð *er* hann sum gongur yvirum undan tær; *sum* ein upptærandi eldur skal hann oyða teir, og hann skal føra teir niður frammi fyri andliti tínum: so skalt tú reka teir út, og oyða teir snarligani, eins og HARRIN hevur sagt við teg.

4 Tala ikki tú í tínum hjarta, eftir at HARRIN tín Guð hevur kastað teir út frammi undan tær, sigandi, Fyri mína rættvísi hevur HARRIN ført meg inn at ognast hetta landið: men fyri vondskuna hjá hesum tjóðunum rekur HARRIN tær út frammi undan tær.

5 Ikki fyri rættvísi tína, ella fyri rættiligleika hjarta tíns, fert tú til at ognast land teirra: men fyri vondskuna hjá hesum tjóðunum rekur HARRIN tín Guð tær út frammi undan tær, og at hann má útinna orðið sum HARRIN svór at fedrum tínum, Ábrahami, Ísaaki, og Jákobi.

6 Skil tessvegna, at HARRIN tín Guð gevur tær ikki hetta góða landið at ognast fyri rættvísi tína; tí at tú *ert* eitt harðsvírað fólk.

7 ¶ Minst til, *og* gloym ikki, hvussu tú upptirraðirt HARRAN tín Guð til vreiðis í oyðuni: frá tí degi ið tú fórt avstað úr Egyptalandi, inntil tit komu at hesum plássi, hava tit verið uppreistrarsamir ímóti HARRANUM.

8 Eisini í Hór-ëb tirraðu tit HARRAN til vreiðis, so at HARRIN var firtin við tykkum til at hava oytt tykkum.

9 Tá ið eg var farin niðan á fjallið at taka við steinstalvunum, *enntá* talvum sáttmálans sum HARRIN gjørdi við tykkum, tá dvaldi eg á fjallinum fjøruti dagar og fjøruti nætur, eg hvørki át breyð ella drakk vatn:

10 Og HARRIN flýggjaði mær tvær talvur av steini, skrivaðar við fingri Guðs; og á tær *var skrivað* samsvarandi við øll orðini, sum HARRIN talaði við tykkum á fjallinum út úr miðjum eldinum á degi savnaðarins.

11 Og tað bar á við endan á fjøruti døgum og fjøruti nætrum, *at* HARRIN gav mær tær tvær talvurnar av steini, *enntá* sáttmálatalvurnar.

12 Og HARRIN segði við meg, Reis *teg*, slepp tær oman snarligani hiðani frá; tí at fólk títt, sum tú hevurt ført fram út úr Egyptalandi, hava spilt *seg sjálvar;* teir eru snarligani vendir til viks út av veginum sum eg ábjóðaði teimum; teir hava gjørt sær eina brædda mynd.

13 Harafturat talaði HARRIN við meg, sigandi, Eg havi sæð hetta fólk, og sí, tað *er* eitt harðsvírað fólk:

14 Lat meg aleinan, at eg má oyða teir, og sletta út teirra navn undan himni: og eg vil gera úr tær eina tjóð, mektigari og miklari enn teir.

15 So eg vendi og kom oman frá fjallinum, og fjallið brann við eldi: og tær tvær talvur sáttmálans *vóru í* hondum mínum tveim.

16 Og eg hugdi, og sí, tit høvdu syndað ímóti HARRANUM Guði tykkara, *og* høvdu gjørt tykkum ein bræddan kálv: tit høvdu vent til viks snarligani út av veginum sum HARRIN hevði boðið tykkum.

17 Og eg tók tær tvær talvurnar, og kastaði tær út úr hondum mínum tveim, og breyt tær frammi fyri eygum tykkara.

18 Og eg fell niður frammi fyri HARRANUM, eins og at byrja við, fjøruti dagar og fjøruti nætur: eg hvørki át breyð, ella drakk vatn, uppá grund av øllum tykkara syndum sum tit syndaðu, í at gera vondligani í eygsjón HARRANS, til at tirra hann til firtnis.

19 Tí at eg var ræddur fyri teirri firtni og heitu misnøgd, hvarvið HARRIN var vreiður ímóti tykkum til at oyða tykkum. Men HARRIN lýddi á meg við tað skiftið við.

20 Og HARRIN var sera firtin við Aaron til at hava oytt hann: og eg bað fyri Aaroni eisini hina somu tíð.

21 Og eg tók tykkara synd, kálvin sum tit høvdu gjørt, og brendi hann við eldi, og trampaði hann, *og* muldi *hann* sera smáan, *enntá* inntil hann var so smáur sum dust: og eg kastaði dustið harav inn í løkin, sum kom oman úr fjallinum.

22 Og í Tăb′-ĕ-râh, og í Măs′-sâh, og í Kĭb′-rōth-hăt-tă-á′-vâh, tirraðu tit HARRAN til vreiðis.

23 Somuleiðis tá ið HARRIN sendi tykkum frá Ká′-dĕsj-bărnĕ′-ŭ, sigandi, Farið niðan og ognist landið sum eg havi givið tykkum; tá gjørdu tit uppreist ímóti ábjóðing HARRANS Guði tykkara, og tit trúðu honum ikki, ella lýddu á rødd hansara.

24 Tit hava verið uppreistrarsamir ímóti HARRANUM frá tí degi sum eg kendi tykkum.

25 Svá fell eg niður frammi fyri HARRANUM fjøruti dagar og fjøruti nætur, eins og eg fell niður *at byrja við;* av tí at HARRIN hevði sagt, *at* hann vildi oyða tykkum.

26 Eg bað tí at HARRANUM, og segði, O Harri GUÐ, oyð ikki fólk títt og arv tín, sum tú hevurt endurloyst ígjøgnum mikilleika tín, sum tú hevurt ført fram út úr Egyptalandi við eini mektigari hond.

27 Minst til tænarar tínar, Ábraham, Ísaak, og Jákob; lít ikki at treisknini hjá hesum fólki, ella til teirra vondsku, ella til teirra synd:

28 At ikki landið, hvaðan tú førdirt okkum út, sigi, Av tí at HARRIN var ikki førur fyri at føra teir inn í landið sum hann fyrijáttaði teimum, og av tí at hann hataði teir, hevur hann ført teir út til at vega teir í oyðuni.

29 Tó *eru* teir fólk títt og arvur tín, sum tú førdirt út við̂ tíni mektigu kraft og við̂ tínum útstrekta armi.

KAPITUL 10

Á TEIRRI tíð segði HARRIN við meg, Høgg tær tvær talvur av steini líkar hinum fyrstu, og kom niðan at mær á fjallið, og ger tær eina ørk av viði.

2 Og eg vil skriva á talvurnar orðini, sum vóru í hinum fyrstu talvunum sum tú breytst, og tú skalt seta tær í ørkina.

3 Og eg gjørdi eina ørk *av* sjĭt′-tím viði, og høgdi tvær talvur av steini líkar hinum fyrstu, og fór niðan á fjallið, havandi talvurnar tvær í hendi mær.

4 Og hann skrivaði á talvurnar, samsvarandi við hina fyrstu ritan, tey tíggju boðini, hvørji HARRIN talaði við tykkum á fjallinum út

úr miðjum eldinum á degi savnaðarins: og HARRIN gav tær at mær.
5 Og eg vendi mær og kom oman frá fjallinum, og legði talvurnar í ørkina sum eg hevði gjørt; og har veri tær, eins og HARRIN ábjóðaði mær.
6 ¶ Og Ísraels børn tóku sína ferð frá Bēēr´-ōth Já´-ă-kăn-s barna til Mó´-sĕ-rā: har doyði Aaron, og har varð hann jarðaður; og Ĕl-ē-ā´-zâr, sonur hansara, tænti í prestsembætinum í hansara stað.
7 Haðani frá ferðaðust teir at Gŭd-gŏ´-dăh; og frá Gŭd-gŏ´-dăh til Jŏt´-băth, eitt land av áum av vøtnum.
8 ¶ Á teirri tíð atskildi HARRIN ættargrein Levīs, til at bera ørk sáttmála HARRANS, til at standa frammi fyri HARRANUM til at tæna at honum, og at vælsigna í hansara navni, at hesum degi.
9 Hvørsvegna Levī hevur ongan part ella arv við brøðrum sínum; HARRIN *er* arvur hansara, samsvarandi sum HARRIN tín Guð lovaði honum.
10 Og eg steðgaði á fjallinum, samsvarandi við hitt fyrra skifti, fjøruti dagar og fjøruti nætur; og HARRIN lýddi á meg við tað skiftið við, *og* HARRIN vildi ikki oyðileggja teg.
11 Og HARRIN segði við meg, Reis *teg*, tak *tína* ferð frammanfyri fólkinum, at teir mega fara inn og *taka* til ognar landið, sum eg svór innat fedrum teirra at geva teimum.
12 ¶ Og nú, Ísrael, hvat krevur HARRIN Guð tín av tær, uttan at óttast HARRAN Guð tín, at ganga í øllum vegum hansara, og at elska hann, og at tæna HARRANUM Guði tínum við øllum hjarta tínum og við allari sál tíni,
13 At halda boðini hjá HARRANUM, og hans ásetingar, sum eg ábjóði tær henda dag tær til góðar?
14 Sí, himinin og himinin av himnum *er* HARRANS Guðs tíns, jørðin *eisini,* við øllum sum hari *er*.
15 Einans HARRIN hevði ein hugnað í tínum fedrum at elska teir, og hann valdi teirra sáð eftir teir, *enntá* tykkum uppum øll fólk, sum *tað er* henda dag.
16 Umskerið tessvegna forhúð hjarta tykkara, og verið ei meira harðsvíraðir.
17 Tí at HARRIN tykkara Guð *er* Guð guda, og Harri harra, ein mikil Guð, ein mektigur, og ein øgiligur, sum metir ikki persónar, ella tekur endurgjald:
18 Hann útinnir dómin hjá tí faðirleysa og einkjuni, og elskar hin fremmanda, í *at* geva honum føði og klædnað.
19 Elskið tit tessvegna hin fremmanda: tí at tit vóru fremmandir í Egyptalandi.
20 Tú skalt óttast HARRAN Guð tín; honum skalt tú tæna, og til hansara skalt tú krøkjast, og svørja við navn hansara.
21 Hann *er* prís títt, og hann *er* Guð tín, sum hevur gjørt fyri teg hesi miklu og øgiligu ting, sum eygu tíni hava sæð.
22 Tínir fedrar fóru niður í Egyptaland við trísinstjúgu og tíggju persónum; og nú hevur HARRIN tín Guð gjørt teg sum stjørnur himins í fjøldleika.

KAPITUL 11

TÍ skalt tú elska HARRAN Guð tín, og halda álegging hans, og hans ásetingar, og dómar hans, og boðini hjá honum, allan veg.
2 Og viti tit henda dag: tí at *eg tali* ikki við tykkara børn sum hava ikki vitað, og sum hava ikki sæð aging HARRANS Guðs tykkara, hansara mikilleika, hansara mektigu hond, og hans útstrekta arm,

3 Og hans undurgerðir, og hansara gerningar, sum hann gjørdi í miðjum Egyptalandi innat Pharaoh kongi av Egyptalandi, og innat øllum landi hansara;
4 Og hvat hann gjørdi Egyptalands heri, teirra hestum, og við teirra vagnar; hvussu hann fekk vatn Reyða-havsins at floyma yvir teir, sum teir eltu eftir tykkum, og *hvussu* HARRIN hevur oytt teir at hesum degi;
5 Og hvat hann gjørdi tykkum í oyðuni, inntil tit komu inn í hetta plássið;
6 Og hvat hann gjørdi Dá´thăn-i og Á´bĭ-răm-i, sonum Ē´lîăb-s Reûbens sonar: hvussu jørðin opnaði sín munn, og svølgdi teir upp, og teirra húshøld, og teirra tjøld, og alt *figgjar*evnið sum *var* í ogn teirra, í miðjum øllum Ísrael:
7 Men tykkara eygu hava sæð allar teir miklu gerningar HARRANS, sum hann gjørdi.
8 Tí skulu tit halda øll boðini sum eg bjóði tykkum henda dag, at tit mega vera sterkir, og fara inn og ognast landið, hvagar tit fara at ognast tað;
9 Og at tit mega framleingja *tykkara* dagar í landinum, sum HARRIN svór tykkara fedrum at geva teimum og til sáðs teirra, eitt land sum flýtur við mjólk og hunangi.
10 ¶ Tí at landið, hvagar tú fert inn at *taka* tað til ognar, *er* ikki eins og Egyptaland, hvaðani frá tit komu út, hvar tú sáðaðirt títt sáð, og vatnaðirt *tað* við fóti tínum, sum ein garð av urtum:
11 Men landið, hvagar tit fara til at ognast tað, *er* eitt land av heyggjum og dølum, *og* drekkur vatn av regni himins:
12 Eitt land sum HARRIN tín Guð hevur umsorgan fyri: eygu HARRANS Guðs tíns *eru* altíð uppá tað, frá byrjanini av árinum enntá at endanum av árinum.
13 ¶ Og tað skal bera á, um tit skulu dúgligani lýða á boðini hjá mær sum eg ábjóði tykkum henda dag, at elska HARRAN Guð tykkara, og at tæna honum við øllum hjarta tykkara og við allari sál tykkara,
14 At eg vil geva *tykkum* regn lands tykkara í røttu tíð tess, tað fyrsta regnið og tað seinna regnið, at tú mást savna inn korn títt, og vín títt, og olju tína.
15 Og eg vil senda gras í akur tín til fenað tín, at tú mást eta og verða mettur.
16 Ansið eftir tykkum sjálvum, at tykkara hjarta verði ikki villleitt, og tit vendi til viks, og tæni øðrum gudum, og tilbiðji teir;
17 Og *so* HARRANS vreiði verði kynd ímóti tykkum, og hann lati aftur himinin, at tað verði einkið regn, og at landið veiti ikki ávøkst sín; og *at ikki* tit farist fljótligani oman av tí góða landi sum HARRIN gevur tykkum.
18 ¶ Tí skulu tit leggja niðurfyri hesi orð míni í tykkara hjarta og í tykkara sál, og binda tey til eitt tekin uppá hond tykkara, at tey mega vera sum pannubond ímillum eygu tykkara.
19 Og tit skulu frálæra tey børnum tykkara, talandi um tey tá ið tú siturt í húsi tínum, og tá ið tú gongurt eftir veginum, tá ið tú legst niður, og tá ið tú reisirst upp.
20 Og tú skalt skriva tey uppá durastavir húss tíns, og uppá tíni portur:
21 At tykkara dagar mega verða margfaldaðir, og dagarnir hjá børnum tykkara, í landinum sum HARRIN svór tykkara fedrum at geva teimum, sum dagar himins uppiá jørðini.
22 ¶ Tí at um tit skulu dúgligani halda øll hesi boð sum eg ábjóði tykkum, at gera tey, at elska HARRAN Guð tykkara, at ganga í

øllum vegum hansara, og at krøkjast at honum;
23 Tá vil HARRIN reka út allar hesar tjóðir frammi undan tykkum, og tit skulu *taka* til ognar miklari tjóðir og mektigari enn tit sjálvir.
24 Hvørt plass, hvará sólarnir á tykkara fótum skulu stíga, skal vera tykkara: frá oyðuni og Lī´-bănōn, frá ánni, ánni Ĕv-phrā´-tēs, alt at tí ytsta sjónum skal breddi tykkara vera.
25 Tað skal eingin maður vera førur fyri at standa frammi fyri tykkum: *tí at* HARRIN Guð tykkara skal leggja óttan fyri tykkum og ønskurin fyri tykkum uppá alt landið sum tit skulu stíga uppá, eins og hann hevur sagt við tykkum.
26 ¶ Sí, eg seti frammi fyri tykkum henda dag eina signing og eina banning;
27 Eina signing, um tit lýði boðini hjá HARRANUM Guði tykkara, sum eg ábjóði tykkum henda dag:
28 Og eina banning, um tit vilji ikki lýða boðini hjá HARRANUM Guði tykkara, men vendi til viks út av veginum sum eg ábjóði tykkum henda dag, at fara eftir øðrum gudum, sum tit hava ikki kent.
29 Og tað skal bera á, tá ið HARRIN tín Guð hevur ført teg inn at landinum, hvagar tú fert til at *taka* tað til ognar, at tú skalt seta signingina uppá Gĕ-rī´-zīm fjall, og banningina uppá Ē´-băl fjall.
30 *Eru* tey ikki hīnumegin Jordan, við vegin har sólin fer niður, í landi Cānaanitanna, sum dvøljast á oyðimarkarslættanum yvir av Gĭl´-găl, við síðuna av Mō´-rĕh slættum?
31 Tí at tit skulu fara yvirum Jordan til at fara inn at ognast landið sum HARRIN Guð tykkara gevur tykkum, og tit skulu ognast tað, og dvøljast harí.
32 Og tit skulu gáa eftir at gera allar ásetingarnar og dómarnar, sum eg seti framfyri tykkum henda dag.

KAPITUL 12

HETTA *eru* ásetingarnar og dómarnir, sum tit skulu gáa eftir at gera í landinum sum HARRIN Guð fedra tína gevur tær at ognast tað, allar dagarnar sum tit liva uppiá jørðini.
2 Tit skulu fullkomiligani oyðileggja øll støðini, í hvørjum tjóðirnar, sum tit skulu *taka* til ognar, tæntu gudum sínum, uppiá teimum høgu fjøllunum, og uppiá heyggjunum, og undir hvørjum grønum træi:
3 Og tit skulu kollrenna altarini hjá teimum, og bróta stólparnar hjá teimum, og brenna lundirnar hjá teimum við eldi; og tit skulu høggja niður hinar ristu myndirnar av gudum teirra, og oyða nøvnini á teimum úr tí plássinum.
4 Tit skulu ikki gera soleiðis innat HARRANUM Guði tykkara.
5 Men innat plássinum sum HARRIN Guð tykkara skal velja burturúr øllum ættargreinum tykkara at seta navn sítt har, *enntá* innat hansara bústaði skulu tit søkja, og hagar skalt tú koma:
6 Og hagar skulu tit koma við tykkara brenniofrum, og tykkara sláturofrum, og tykkara tíggjundum, og hevjiofrum av tykkara hond, og tykkara heitum, og tykkara fríviljaofrum, og frumavkomunum av tykkara stórfæafylgjum og av tykkara smáfæafylgjum:
7 Og har skulu tit eta frammi fyri HARRANUM Guði tykkara, og tit skulu fegnast í øllum sum tit seta hond tykkara at, tit og húshøld tykkara, í hvørjum HARRIN tín Guð hevur vælsignað teg.
8 Tit skulu ikki gera eftir øllum *teimum tingunum* sum vit gera her henda dag, hvør maður hvat-

sumhelst *ið er* rætt í egnu eygum sínum.

9 Tí at tit eru ikki sum enn *er* komnir til hvíldina og til arvin, sum HARRIN Guð tykkara gevur tykkum.

10 Men *tá ið* tit fara yvirum Jordan, og búgva í landinum sum HARRIN Guð tykkara gevur tykkum at arva, og *tá ið* hann gevur tykkum hvílu frá øllum tykkara fíggindum runt umkring, so at tit búgva í tryggleika;

11 Tá skal tað finnast eitt pláss, sum HARRIN Guð tykkara skal velja at elva navni sínum at dvøljast har; hagar skulu tit koma við øllum sum eg ábjóði tykkum; tykkara brenniofrum, og tykkara sláturofrum, tykkara tíggjundum, og hevjiofrinum av tykkara hond, og øllum tykkara úrvals heitum sum tit heita HARRANUM:

12 Og tit skulu fegnast frammi fyri HARRANUM Guði tykkara, tit, og synir tykkara, og døtur tykkara, og tænastusveinar tykkara, og tænastugentur tykkara, og Levitin sum *er* innanfyri portur˘ tykkara; við tað at hann hevur ongan part ella arv við tykkum.

13 Ansa eftir tær sjálvum, at tú ofri ikki tíni brennioffur í hvørjum plássi sum tú sært:

14 Men í tí plássi sum HARRIN skal velja í ēini av ættargreinum tínum, har skalt tú ofra tíni brennioffur, og har skalt tú gera alt sum eg bjóði tær.

15 Hóast hetta, tú kanst drepa og eta kjøt í øllum portrum tínum, hvatsumhelst *ið* sál tín girnast eftir, samsvarandi við signing HARRANS Guðs tíns sum hann hevur givið tær: hin óreini og hin reini mega eta harav, eins og av rábukkinum, og eins og av hjørtinum.

16 Einans tit skulu ikki eta blóðið; tit skulu hella tað uppá jørðina sum vatn.

17 ¶ Tú mást ikki eta innanfyri tíni portur tíggjundina av korni tínum, ella av víni tínum, ella av olju tíni, ella av frumavkomunum av stórfæafylgjum tínum ella av smáfæafylgi tínum, ella nakað av tínum heitum sum tú heitirt, ella tíni fríviljaoffur, ella hevjioffur av tíni hond:

18 Men tú mást eta tey frammi fyri HARRANUM Guði tínum í tí plássi sum HARRIN tín Guð skal velja, tú, og sonur tín, og dóttir tín, og tín tænastusveinur, og tín tænastugenta, og Levitin sum *er* innanfyri portur tíni: og tú skalt fegnast frammi fyri HARRANUM Guði tínum í øllum sum tú seturt hendur tínar at.

19 Ansa eftir tær sjálvum, at tú yvirgevi ikki Levitan so leingi sum tú livirt uppiá jørðini.

20 ¶ Tá ið HARRIN tín Guð skal vaksa um títt landamark, eins og hann hevur lovað tær, og tú skalt siga, Eg vil eta kjøt, av tí at sál tíni leingist *eftir* at eta kjøt; tú kanst eta kjøt, hvatsumhelst *ið* sál tín girnast eftir.

21 Um plássið, sum HARRIN tín Guð hevur valt at seta navn sítt har, veri ov langt frá tær, tá skalt tú drepa av stórfæafylgi tínum og av smáfæafylgi tínum, sum HARRIN hevur givið tær, eins og eg havi áboðið tær, og tú skalt eta í portrum tínum hvatsumhelst *ið* sál tín girnast eftir.

22 Enntá eins og rábukkurin og hjørturin verður etin, soleiðis skalt tú eta tey: hin óreini og hin reini skulu eta *av* teimum líka.

23 Einans ver vísur *í* at tú eti ikki blóðið: tí at blóðið *er* lívið; og tú mást ikki eta lívið við kjøtinum.

24 Tú skalt ikki eta tað; tú skalt hella tað uppá jørðina sum vatn.

25 Tú skalt ikki eta tað; at tað má ganga væl við tær, og við børnum tínum eftir teg, tá ið tú

skalt gera *tað sum er* rætt í eygsjón HARRANS.
26 Einans tíni heilagu ting sum tú hevurt, og tíni heitir, skalt tú taka, og fara at tí plássinum sum HARRIN skal velja:
27 Og tú skalt ofra tíni brenni-offur, kjøtið og blóðið, uppiá altari HARRANS Guðs tíns: og blóðið av tínum sláturofrum skal verða helt út uppá altar HARRANS Guðs tíns, og tú skalt eta kjøtið.
28 Gev ans eftir og hoyr øll hesi orðini sum eg ábjóði tær, at tað má ganga væl við tær, og við børnum tínum eftir teg um ævir, tá ið tú gert *tað sum er* gott og rætt í eygsjón HARRANS Guðs tíns.
29 ¶ Tá ið HARRIN tín Guð skal skera av tjóðirnar frammi fyri tær ífrá, hvagar tú fert til at ognast tær, og tú avloysirt tær, og býrt í landi teirra;
30 Ansa eftir tær sjálvum, at tú verði ikki snerraður við at fylgja teimum, eftir at tær verði oyddar frammi undan tær; og at tú spyrji ikki eftir teirra gudum, sigandi, Hvussu tæntu hesar tjóðir gudum sínum? enntá soleiðis vil eg gera líkaleiðis.
31 Tú skalt ikki gera soleiðis innat HARRANUM Guði tínum: tí at hvørja andstygd fyri HARRANUM, sum hann hatar, hava tær gjørt innat gudum sínum; tí at enntá synir sínar og døtur sínar hava teir brent í eldinum til guda sína.
32 Hvørt ting sumhelst *sum* eg ábjóði tykkum, gáið eftir at gera tað: tú skalt ikki leggja afturat hartil, ella minka frá tí.

KAPITUL 13

UM tað rísi *upp* tykkara millum ein prophetur, ella ein droymari av dreymum, og gevur tær eitt tekin ella eitt undur,
2 Og tekinið ella undrið beri á, um hvørt hann talaði við teg, sigandi, Latum okkum fara eftir øðrum gudum, sum tú hevurt ikki kent, og latum oss tæna teimum;
3 Tú skalt ikki geva gætur eftir orðunum hjá tí prophetinum, ella tí droymaranum av dreymum: tí at HARRIN Guð tykkara roynir tykkum, at vita hvørt tit elski HARRAN Guð tykkara við øllum hjarta tykkara og við allari sál tykkara.
4 Tit skulu ganga eftir HARRANUM Guði tykkara, og óttast hann, og halda boðini hjá honum og lýða rødd hansara, og tit skulu tæna honum, og krøkjast at honum.
5 Og tann propheturin, ella tann droymarin av dreymum, skal verða tikin av lívi; av tí at hann hevur talað til at snúgva *tykkum* burtur frá HARRANUM Guði tykkara, sum førdi tykkum út úr Egyptalandi, og endurloysti tykkum út úr trældóms-húsinum, til at stoyta teg út av veginum sum HARRIN tín Guð ábjóðaði tær at ganga á. Soleiðis skalt tú koyra hitt illa burtur frá miðjum tær.
6 ¶ Um bróðir tín, sonur móður tínar, ella sonur tín, ella dóttir tín, ella vív fangs tíns, ella tín vinur, sum *er* eins og tín egna sál, lokki teg loyniligani, sigandi, Latum okkum fara og tæna øðrum gudum, sum tú hevurt ikki kent, tú, ella fedrar tínir;
7 *Nevniliga,* av gudunum hjá fólkinum sum *eru* runt umkring tykkum, í nánd at tær, ella langt burturi frá tær, frá tí *ēina* enda jarðarinnar enntá at *hīnum* enda jarðarinnar;
8 Tú skalt ikki samtykkja honum, ella geva gætur at honum; eiheldur skal eyga títt várkunna honum, eiheldur skalt tú eira, eiheldur skalt tú loyna hann:
9 Men tú skalt vissuliga drepa hann; tín hond skal vera fyrst uppiá honum til at taka hann av lívi, og síðan hondin hjá øllum fólkinum.

10 Og tú skalt steina hann við steinum, at hann doyggi; av tí at hann hevur roynt at stoyta teg burtur frá HARRANUM Guði tínum, sum førdi teg út úr Egyptalandi, frá trældóms-húsinum.

11 Og alt Ísrael skal hoyra, og óttast, og skal ei meira gera nakra slíka vondsku sum hetta er tykkara millum.

12 ¶ Um tú skalt hoyra *sagt* í ēinum av staðum tínum, sum HARRIN tín Guð hevur givið tær at dvøljast har, sigandi,

13 *Avísir* menn, Bē´-lĭ-ăl-s børn, eru farnir út tykkara millum ífrá, og hava drigið burt íbúgvarnar av staði sínum, sigandi, Latum oss fara og tæna øðrum gudum, sum tit hava ikki kent;

14 So skalt tú fregna, og gera kanning, og spyrja dúgligani; og sí, *um tað veri* sannleiki, *og* tingið vist, *at* slík andstygd er virkað tykkara millum;

15 Tú skalt vissuliga sláa íbúgvarnar av tí staði við svørðseggini, oyðandi hann aldeilis, og alt sum *er* harí, og hansara fenað, við svørðseggini.

16 Og tú skalt savna allan fongin av honum inn í miðju strætis hansara, og skalt brenna við eldi staðin, og allan fong hansara hvørt vet, fyri HARRAN Guð tín: og hann skal vera ein dungi um ævir; hann skal ikki verða bygdur aftur.

17 Og tað skal krøkjast einkið av tí bannaða tinginum til handar tínar: at HARRIN má venda frá grimmleikanum av síni firtni, og sýna tær miskunn, og hava várkunn uppá teg, og margfalda teg, eins og hann hevur svorið fedrum tínum;

18 Tá ið tú skalt lurta eftir rødd HARRANS Guðs tíns, at halda øll hansara boð sum eg ábjóði tær henda dag, at gera *tað sum er* rætt í eygum HARRANS Guðs tíns.

KAPITUL 14

TIT *eru* børn HARRANS Guðs tykkara: tit skulu ikki skera tykkum sjálvar, ella gera nakran skallutleika ímillum eygu tykkara fyri hinar deyðu.

2 Tí at tú *ert* eitt heilagt fólk yvirfyri HARRANUM Guði tínum, og HARRIN hevur valt teg at vera eitt seregið fólk at sær sjálvum, uppum allar tjóðirnar sum *eru* uppiá jørðini.

3 ¶ Tú skalt ikki eta nakað andstyggiligt ting.

4 Hesi *eru* djórini, sum tit skulu eta: oksan, seyðin, og geitina,

5 Hjørtin, og rábukkin, og dádýrið, og villgeitina, og antilopuna, og villoksan, og gaselluna.

6 Og hvørt djór sum deilir kleyvina, og klývur klónna í tvær klógvar, *og* tyggir jótrið djóranna millum, tað skulu tit eta.

7 Hóast hetta, hesi skulu tit ikki eta av teimum sum tyggja jótrið, ella av teimum sum deila klovnu kleyvina; *eins og* kamelin, og haruna, og kaninina: tí at tey tyggja jótrið, men deila ikki kleyvina; *tí eru* tey órein at tykkum.

8 Og svínið, av tí at tað deilir kleyvina, tó tyggir ikki jótrið, tað *er* óreint at tykkum: tit skulu ikki eta av teirra kjøti, ella nerta við teirra deyða ræ.

9 ¶ Hesi skulu tit eta av øllum sum *eru* í vøtnunum: øll, sum hava fjaðrar og roðslu, skulu tit eta:

10 Og hvatsumhelst *ið* hevur ikki fjaðrar og roðslu, mega tit ikki eta; tað *er* óreint at tykkum.

11 ¶ *Av* øllum reinum fuglum skulu tit eta.

12 Men hesir *eru teir,* av hvørjum tit skulu ikki eta: ørnin, og glentan, og havørnin,

13 Og falkurin, og skaðafalkurin, og gammurin eftir slagi hans,

14 Og hvør ravnur eftir slagi hans,

15 Og uglan, og náttheykurin, og geykurin, og heykurin eftir slagi hans,
16 Lítla uglan, og stóra uglan, og svanurin,
17 Og pelikanurin, og rægammurin, og hiplingurin,
18 Og storkurin, og hegrin eftir slagi hans, og herfuglurin, og flogmúsin.
19 Og hvørt skriðkykt, sum flýgur, *er* óreint at tykkum: tey skulu ei verða etin.
20 *Men av* øllum reinum fuglum mega tit eta.
21 ¶ Tit skulu ikki eta *av* nøkrum sum doyr av sær sjálvum: tú skalt geva tað at hinum fremmanda sum *er* í portrum tínum, at hann má eta tað; ella tú kanst selja einum firringi tað: tí at tú *ert* eitt heilagt fólk yvirfyri HARRANUM Guði tínum. Tú skalt ikki sjóða eitt lamb í mjólk móður hans.
22 Tú skalt sanniliga tíggjunda allan gróðurin av sáði tínum, sum akurin ber fram ár um ár.
23 Og tú skalt eta frammi fyri HARRANUM Guði tínum, í plássinum sum hann skal velja at staðseta navn sítt har, tíggjundina av korni tínum, av víni tínum, og av olju tíni, og frumavkomini av tínum stórfæafylgjum og av tínum smáfæafylgjum; at tú mást læra at óttast HARRAN tín Guð altíð.
24 Og um vegurin veri ov langur hjá tær, so at tú ert ikki førur fyri at bera tað; *ella* um plássið veri ov langt frá tær, sum HARRIN tín Guð skal velja at seta navn sítt har, tá ið HARRIN tín Guð hevur vælsignað teg:
25 So skalt tú skifta *tað* yvirí pening, og binda upp peningin í hond tíni, og skalt fara at plássinum sum HARRIN tín Guð skal velja:
26 Og tú skalt lata út tann peningin fyri hvatsumhelst *ið* sál tín girnast eftir, fyri oksar, ella fyri seyð, ella fyri vín, ella fyri sterkan drykk, ella fyri hvatsumhelst *ið* sál tín tráar: og tú skalt eta har frammi fyri HARRANUM Guði tínum, og tú skalt fegnast, tú, og húshald títt,
27 Og Levitin, sum *er* innanfyri portur tíni; tú skalt ikki yvirgeva hann; tí at hann hevur ongan part ella arv við tær.
28 ¶ Við endan á trimum árum skalt tú koma fram við allari tíggjundini av gróðri tínum tað sama árið, og skalt leggja *tað* niðurfyri innanfyri portur tíni:
29 Og Levitin, (av tí at hann hevur ongan part ella arv við tær,) og hin fremmandi, og hin faðirleysi, og einkjan, sum *eru* innanfyri portur tíni, skulu koma, og skulu eta og verða mettaði; at HARRIN tín Guð má vælsigna teg í øllum arbeiði av tíni hond sum tú gert.

KAPITUL 15

VIÐ endan á *hvørjum* sjey árum skalt tú gera eina leyslating.
2 Og hetta *er* háttarlagið av leyslatingini: Hvør áognari, sum lænir *nakað* at næsta sínum, skal loysa *tað;* hann skal ikki krevja *tað* av næsta sínum, ella av bróður sínum; av tí at tað verður kallað HARRANS leyslating.
3 Av einum fremmandum kanst tú krevja *tað aftur:* men *tað*, sum er títt hjá bróður tínum, skal hond tín leyslata;
4 Uttan tá ið tað eingir fátækir skulu vera tykkara millum; tí at HARRIN skal stórliga vælsigna teg í landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær *til* ein arv at ognast tað:
5 Einans um tú umhyggjuliga gevi gætur at rødd HARRANS Guðs tíns, at gáa eftir at gera øll hesi boðini sum eg ábjóði tær henda dag.

6 Tí at HARRIN tín Guð vælsignar teg, eins og hann lovaði tær: og tú skalt útlána mongum tjóðum, men tú skalt ikki læna; og tú skalt ríkja yvir mongum tjóðum, men tær skulu ikki ríkja yvir tær.

7 ¶ Um tað veri tykkara millum ein fátækur maður av ēinum av brøðrum tínum innanfyri nakað av portrum tínum í landi tínum, sum HARRIN tín Guð gevur tær, tú skalt ikki herða títt hjarta, ella lata aftur tína hond frá fátæka bróður tínum:

8 Men tú skalt opna hond tína vítt at honum, og skalt vissuliga læna honum nóg mikið fyri hansara tørv, *í tí* sum honum vantar.

9 Ver varin, at tað veri ikki ein hugsan í vonda hjarta tínum, sigandi, Tað sjeynda árið, leyslatingar-árið, er fyri hond; og títt eyga veri ilt ímóti fátæka bróður tínum, og tú einkið gevurt honum; og hann rópi á HARRAN ímóti tær, og tað veri synd at tær.

10 Tú skalt vissuliga geva honum, og títt hjarta skal ikki harmast, tá ið tú gevurt honum: av tí at fyri henda lut skal HARRIN tín Guð vælsigna teg í øllum verkum tínum, og í øllum sum tú seturt hond tína at.

11 Tí hin fátæki skal aldri halda uppat út úr landinum: tí ábjóði eg tær, sigandi, Tú skalt opna hond tína vítt at bróður tínum, fyri fátæka tínum, og fyri tørvandi tínum, í landi tínum.

12 ¶ *Og* um bróðir tín, ein Hebrāiskur maður, ella ein Hebrāisk kvinna, verði seld at tær, og tæni tær seks ár; tá í tí sjeynda árinum skalt tú lata hann fara frían frá tær.

13 Og tá ið tú sendirt hann út frían frá tær, tú skalt ikki lata hann fara avstað tóm*hent*an:

14 Tú skalt búgva hann frælsliganí burturúr tínum smáfæafylgi, og burturav gólvi tínum, og burturúr vínpersu tíni: *av tí,* hvarvið HARRIN tín Guð hevur vælsignað teg, skalt tú geva honum.

15 Og tú skalt minnast til, at tú vart eitt trælmenni í Egyptalandi, og HARRIN tín Guð endurloysti teg: tí skipi eg tær henda lut í dag.

16 Og tað skal verða, um hann sigi við teg, Eg vil ikki fara avstað frá tær; av tí at hann elskar teg og títt hús, av tí at honum er væl *statt* hjá tær;

17 So skalt tú taka eina sýl, og stoyta *hana* ígjøgnum hans oyra at hurðini, og hann skal vera tín tænari um ævir. Og eisini at tíni tænastugentu skalt tú gera líkaleiðis.

18 Tað skal ikki tykjast tær hart, tá ið tú sendirt hann avstað frían frá tær; tí at hann hevur verið verdur ein tvífaldan leigaðan tænara *fyri tær,* í at tæna tær seks ár: og HARRIN tín Guð skal vælsigna teg í øllum sum tú gert.

19 ¶ Allar frumburðar hannarnar, sum koma av tínum stórfæafylgi og av tínum smáfæafylgi, skalt tú halga HARRANUM Guði tínum: tú skalt einkið arbeiði gera við frumburði ungtarvs tíns, ella klippa frumburði seyðar tíns.

20 Tú skalt eta *hann* frammi fyri HARRANUM Guði tínum ár um ár í tí plássi sum HARRIN skal velja, tú og títt húshald.

21 Og um tað veri *nakað* lýti harí, *eins og um hann veri seg* lamin, ella blindur, *ella havi* nakað ilt lýti, tú skalt ikki sláturofra hann at HARRANUM Guði tínum.

22 Tú skalt eta hann innanfyri portur tíni: tann óreini og tann reini *persónurin skulu eta hann* líka, eins og rábukkin, og eins og hjørtin.

23 Einans tú skalt ikki eta blóðið harav; tú skalt hella tað uppá jørðina sum vatn.

KAPITUL 16

GEV ans eftir Ábib mánaði, og halt umleypið at HARRANUM Guði tínum: tí at í Ábibs mánaði førdi HARRIN tín Guð teg fram út úr Egyptalandi um nátt*ina*.

2 Tú skalt tí sláturofra umleypið at HARRANUM Guði tínum, av stórfæafylginum og av smáfæafylginum, í tí plássi sum HARRIN skal velja at staðseta navn sítt har.

3 Tú skalt einkið súrgað breyð eta við tí; sjey dagar skalt tú eta ósúrgað breyð harvið, *enntá* nívdar breyðið; tí at tú komst fram út úr Egyptalandi í skundi: at tú mást minnast tann dag, tá ið tú komst fram úr Egyptalandi allar dagar lívs tíns.

4 Og tað skal einkið súrgað breyð verða sæð hjá tær í øllum bredda tínum sjey dagar; eiheldur skal *nakað ting* av kjøtinum, sum tú sláturofraðirt hin fyrsta dagin um aftan, verða verandi alla nátt inntil morgunin.

5 Tú mást ikki sláturofra umleypið innanfyri nakað av portrum tínum, sum HARRIN tín Guð gevur tær:

6 Men í tí plássi sum HARRIN tín Guð skal velja at staðseta navn sítt í, har skalt tú sláturofra umleypið um aftan, við niðurfaring sólarinnar, við tíðina sum tú komst fram út úr Egyptalandi.

7 Og tú skalt steikja og eta *tað* í tí plássi sum HARRIN Guð tín skal velja: og tú skalt snúgva um morgunin, og fara at tjøldum tínum.

8 Seks dagar skalt tú eta ósúrgað breyð: og á tí sjeynda deginum *skal vera* ein hátíðar-savnaður fyri HARRANUM Guði tínum: tú skalt einkið arbeiði gera *harí*.

9 ¶ Sjey vikur skalt tú upptelja tær: byrja at upptelja tær sjey vikurnar frá *slíkari tíð sum* tú byrjart *at seta* akurknívin til kornið.

10 Og tú skalt halda vikna-hátíðina at HARRANUM Guði tínum við einum íkasti av einum fríviljaofri av tíni hond, sum tú skalt geva *at HARRANUM Guði tínum,* samsvarandi sum HARRIN tín Guð hevur vælsignað teg:

11 Og tú skalt fegnast frammi fyri HARRANUM Guði tínum, tú, og sonur tín, og dóttir tín, og tænastusveinur tín, og tænastugenta tín, og Levitin sum *er* innanfyri portur tíni, og hin fremmandi, og hin faðirleysi, og einkjan, sum *eru* tykkara millum, í tí plássi sum HARRIN tín Guð hevur valt at staðseta navn sítt har.

12 Og tú skalt minnast, at tú vart eitt trælmenni í Egyptalandi: og tú skalt geva ans eftir og gera hesar ásetingar.

13 ¶ Tú skalt geva ans eftir tabernakla-hátíðini sjey dagar, eftir at tú hevurt savnað inn korn títt og vín títt:

14 Og tú skalt fegnast í hátíð tíni, tú, og sonur tín, og dóttir tín, og tænastusveinur tín, og tænastugenta tín, og Levitin, hin fremmandi, og hin faðirleysi, og einkjan, sum *eru* innanfyri portur tíni.

15 Sjey dagar skalt tú halda eina hátíðar-veitslu at HARRANUM Guði tínum í tí plássi sum HARRIN skal velja: av tí at HARRIN tín Guð skal vælsigna teg í allari grøði tíni, og í øllum arbeiðum handa tína, tí skalt tú vissuliga fegnast.

16 ¶ Tríggjar ferðir í ári skulu allir hannar tínir birtast frammi fyri HARRANUM Guði tínum í tí plássi sum hann skal velja; í hátíð ósúrgaðs breyðs, og í vikna-hátíðini, og í tabernakla-hátíðini: og teir skulu ikki birtast frammi fyri HARRANUM tóm*hent*ir:

17 Hvør maður *skal geva* sum hann er førur fyri, samsvarandi við signing HARRANS Guðs tíns sum hann hevur givið tær.

18 ¶ Dómarar og yvirmenn skalt tú gera tær í øllum portrum tínum, sum HARRIN tín Guð gevur tær, út gjøgnum ættargreinir tínar: og teir skulu døma fólkið við rættlátum dómi.

19 Tú skalt ikki reingja dóm; tú skalt ikki meta persónar, eiheldur taka eina gávu: tí at ein gáva blindar eygu teirra vísu, og spillir orðini hjá teimum rættvísu.

20 Tí, sum er aldeilis rættlátt, skalt tú fylgja, at tú mást liva, og arva landið sum HARRIN tín Guð gevur tær.

21 ¶ Tú skalt ikki planta tær eina lund av nøkrum trøum nær altari HARRANS Guðs tíns, sum tú skalt gera tær.

22 Eiheldur skalt tú seta tær upp *nakra* mynd; sum HARRIN tín Guð hatar.

KAPITUL 17

TÚ skalt ikki sláturofra at HARRANUM Guði tínum *nakran* ungtarv, ella seyð, hvarí er lýti, *ella* nakar illvaksinleiki: tí at tað *er* ein andstygd at HARRANUM Guði tínum.

2 ¶ Um tað verði funnið tykkara millum, innanfyri nakað av portrum tínum sum HARRIN tín Guð gevur tær, maður ella kvinna, sum hevur virkað vondsku í eygsjón HARRANS Guðs tíns, í *at* misbróta sáttmála hansara,

3 Og hevur farið og tænt øðrum gudum, og tilbiðið teir, annaðhvørt sólini, ella mánanum, ella nøkrum av heri himins, sum eg havi ikki áboðið;

4 Og tað verði sagt tær, og tú hevurt hoyrt *um tað*, og spurt *teg* fyri dúgligani, og sí, *tað veri seg* satt, *og* tingið vist, *at* slík andstygd er virkað í Ísrael:

5 Tá skalt tú føra fram handa mann ella hasa kvinnu, sum hava framt hatta vonda ting, at portrum tínum, *enntá* handa mann ella hasa kvinnu, og skalt steina tey við steinum, til tey doyggi.

6 Við munninum á tveimum vitnum, ella trimum vitnum, skal hann, sum er verdigur til deyða, verða tikin av lívi; *men* við munninum á ēinum vitni skal hann ei verða tikin av lívi.

7 Hendurnar hjá vitnunum skulu vera fyrstar uppiá honum til at taka hann av lívi, og síðani hendurnar hjá øllum fólkinum. Soleiðis skalt tú koyra hitt illa burtur tykkara millum ífrá.

8 ¶ Um tað rísi eitt mál ov torført hjá tær í dómi, ímillum blóð og blóð, ímillum pástand og pástand, og ímillum slag og slag, *sum eru* deilumál innanfyri portur tíni: tá skalt tú reisast, og sleppa tær upp í tað plássið sum HARRIN Guð tín skal velja;

9 Og tú skalt koma at prestunum, Levitunum, og at dómaranum sum skal vera í teimum døgum, og spyrja *teg* fyri; og teir skulu sýna tær dómssetningin:

10 Og tú skalt gera samsvarandi við setningin, sum teir av tí plássi, sum HARRIN skal velja, skulu sýna tær; og tú skalt geva ans eftir at gera samsvarandi við alt sum teir upplýsa tær:

11 Samsvarandi við setning lógarinnar sum teir skulu frálæra tær, og samsvarandi við dómin sum teir skulu siga tær, skalt tú gera: tú skalt ikki halda undan frá setninginum sum teir skulu sýna tær, *til* hinnar høgru handar, ella *til* hinnar vinstru.

12 Og tann maðurin sum vil gera framførnisligani, og vil ikki geva gætur at prestinum sum stendur at tæna har frammi fyri HARRANUM Guði tínum, ella at dómaranum, enntá hasin maðurin skal doyggja: og tú skalt koyra burtur hitt illa frá Ísrael.

13 Og alt fólkið skal hoyra, og óttast, og gera ei meira framførnisligani.

14 ¶ Tá ið tú ert komin at landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær, og skalt ognast tað, og skalt dvøljast harí, og skalt siga, Eg vil seta ein kong yvir mær, líka sum allar tjóðirnar sum *eru* kring meg;

15 Tú skalt í øllum vísi seta *hann til* kong yvir tær, hvønn HARRIN tín Guð skal velja: *ein* burturúr brøðrum tínum skalt tú seta *til* kong yvir tær: tú mást ikki seta ein fremmandan yvir tær, sum *er* ikki bróðir tín.

16 Men hann skal ikki margfalda hestar til sín sjálvs, ella volda fólkinum at venda aftur til Egyptalands, til tess endamáls at hann skuldi margfaldað hestar: við tað at HARRIN hevur sagt við tykkum, Tit skulu hiðanífrá venda aftur ei meira handa vegin.

17 Eiheldur skal hann margfalda vív˘ til sín sjálvs, at hansara hjarta snúgvi ikki burtur: eiheldur skal hann stórliga margfalda til sín sjálvs silvur og gull.

18 Og tað skal verða, tá ið hann situr uppiá hásæti kongadømis síns, at hann skal skriva sær eitt avrit av hesi lóg í eina bók burtur úr *henni sum er* frammanfyri prestunum, Levitunum:

19 Og hon skal vera hjá honum, og hann skal lesa harí allar dagar lívs síns: at hann má læra at óttast HARRAN Guð sín, at halda øll orðini av hesi lóg og hesar áseting-ar, at gera tær:

20 At hansara hjarta verði ikki lyft upp uppum brøður hansara, og at hann snúgvi ikki til viks frá boðinum, *til* hinnar høgru handar, ella *til* hinnar vinstru: til tess endamáls, at hann má framleingja *sínar* dagar í kongadømi sínum, hann, og børn hansara, í miðjum Ísrael.

KAPITUL 18

PRESTARNIR, Levitarnir, *og* øll ættargrein Levis, skulu ongan part ella arv hava við Ísrael: teir skulu eta HARRANS offur gjørd við˘ eldi, og arv hans.

2 Tí skulu teir ongan arv hava millum brøðra sína: HARRIN *er* arvur teirra, eins og hann hevur sagt við teir.

3 ¶ Og hetta skal vera prestsins rættindi frá fólkinum, frá teimum sum ofra eitt sláturoffur, hvørt *tað veri* oksi ella seyður; og teir skulu geva prestinum bógvin, og teir tveir kjálkarnar, og magasekkin.

4 Frumgróðurin *eisini* av korni tínum, av víni tínum, og av olju tíni, og tað fyrsta av ullini av seyði tínum, skalt tú geva honum.

5 Tí at HARRIN tín Guð hevur valt hann burtur úr øllum ættargreinum tínum, at standa at tæna í navni HARRANS, hann og synir hansara um ævir.

6 ¶ Og um ein Leviti komi frá nøkrum av portrum tínum úr øllum Ísrael, har hann útisat, og komi við allari trá hugar síns at ti plássi sum HARRIN skal velja;

7 Tá skal hann tæna í navni HARRANS Guðs síns, eins og allir brøður hansara, Levitarnir, *gera*, sum standa har frammi fyri HARRANUM.

8 Teir skulu hava líkar skamtir at eta, umframt tað sum kemur av søluni av fedraarvi hansara.

9 ¶ Tá ið tú ert komin inn í landið sum HARRIN tín Guð gevur tær, tú skalt ikki læra at gera eftir andstygdunum hjá teimum tjóðunum.

10 Tað skal ikki finnast tykkara millum *nakar* sum fær son sín ella dóttur sína at fara ígjøgnum eldin, *ella* sum brúkar spásøgn, *ella* ein gáari eftir tíðum, ella ein gandakvøðari, ella ein heks,

11 Ella ein rúnabindari, ella ein ráðførari við vælkunnugar andar, ella ein gandakallur, ella ein andamanari.

12 Tí at allir, sum gera hesar lutir, *eru* ein andstygd at HARRANUM: og uppá grund av hesum andstygdum rekur HARRIN tín Guð teir út frammi undan tær.

13 Tú skalt vera fullkomin við HARRANUM Guði tínum.

14 Tí at hesar tjóðirnar, sum tú skalt *taka* til ognar, góvu gætur at gáarum eftir tíðum, og at spásigarum: men hvat tær viðvíkur, HARRIN tín Guð hevur ikki loyvt tær soleiðis *at gera*.

15 ¶ HARRIN tín Guð vil reisa tær upp ein Prophet frá miðjum tær, av brøðrum tínum, mær líkan; honum skulu tit geva gætur;

16 Samsvarandi við alt sum tú tráðaðirt av HARRANUM Guði tínum á Hór´-ëb á degi savnaðarins, sigandi, Lat meg ikki hoyra aftur rødd HARRANS Guðs míns, eiheldur lat meg síggja henda mikla eld meira, at eg doyggi ei.

17 Og HARRIN segði við meg, Teir hava *talað* væl *tað* sum teir hava talað.

18 Eg vil reisa teimum upp ein Prophet burturúr brøðrum teirra, tær líkan, og vil leggja orð míni í hansara munn; og hann skal tala við teir alt sum eg skal ábjóða honum.

19 Og tað skal bera á, *at* hvørsumhelst *ið* vil ikki geva gætur at orðum mínum sum hann skal tala í navni mínum, eg vil krevja *tað* av honum.

20 Men tann propheturin, sum skal vága at tala eitt orð í navni mínum, sum eg havi ikki áboðið honum at tala, ella sum skal tala í navni annara guda, enntá hasin propheturin skal doyggja.

21 Og um tú sigi í hjarta tínum, Hvussu skulu vit kenna tað orðið sum HARRIN hevur ikki talað?

22 Tá ið ein prophetur talar í navni HARRANS, um tingið fylgi ikki, ella beri á, tað *er* tað tingið sum HARRIN hevur ikki talað, *men* propheturin hevur talað tað framførnisliga: tú skalt ikki vera ræddur fyri honum.

KAPITUL 19

TÁ ið HARRIN tín Guð hevur avskorið tjóðirnar, hvørs land HARRIN tín Guð gevur tær, og tú avloysirt tær, og býrt í staðum teirra, og í húsum teirra;

2 *Tá* skalt tú atskilja tríggjar staðir til tín í miðjum landi tínum, sum HARRIN tín Guð gevur tær at ognast tað.

3 Tú skalt fyribúgva tær ein veg, og skifta breddar lands tíns, sum HARRIN tín Guð gevur tær at arva, í tríggjar partar, at hvør banamaður má flýggja hagar.

4 ¶ Og hetta *er* málsevni banamansins, sum skal flýggja hagar, at hann má liva: Hvørið-enn drepur sín næsta vankunnugliga, hvønn hann hataði ikki í farnari tíð;

5 Eins og tá ið ein maður fer inn í skógin við sínum næsta at høgga við', og hans hond heintar eitt slag við øksini til at skera niður træið, og blaðið gleppur frá skaftinum, og lendir uppiá næsta hans, at hann doyggi; hann skal flýggja at einum av teimum staðunum, og liva:

6 At ikki hevnarin av blóðinum elti banamannin, meðan hjarta hans er heitt, og innheinti hann, av tí at vegurin er langur, og bani honum; hvar ið hann *var* ikki verdigur til deyða, við tað at hann hataði hann ikki í farnari tíð.

7 Hvørsvegna eg ábjóði tær, sigandi, Tú skalt atskilja tríggjar staðir til tín.

8 Og um HARRIN tín Guð vaksi um bredda tín, eins og hann hevur svorið fedrum tínum, og gevi

tær alt landið sum hann fyrijáttaði at geva fedrum tínum;
9 Um tú skalt halda øll hesi boðini at gera tey, sum eg ábjóði tær henda dag, at elska HARRAN Guð tín, og at ganga ævir í vegum hansara; so skalt tú leggja aftur at tríggjar staðir fleiri til tín, umframt hesar tríggjar:
10 At sakleyst blóð verði ikki helt í landi tínum, sum HARRIN tín Guð gevur tær *til* ein arv, og *so* blóð veri uppiá tær.
11 ¶ Men um nakar maður hati næsta sín, og liggi á lúri eftir honum, og rísi upp ímóti honum, og slái hann deyðiligani, *so* at hann doyggi, og flýggjar inn í ēin av hesum staðunum:
12 Tá skulu teir elstu av hansara staði senda og heinta hann haðani, og flýggja hann inn í hondina á blóðshevnaranum, at hann má doyggja.
13 Títt eyga skal ikki várkunna honum, men tú skalt koyra burtur *sektina av* sakleysum blóði frá Ísrael, at tað má ganga væl við tær.
14 ¶ Tú skalt ikki burtflyta landamark næsta tíns, sum teir av gamlari *tíð* hava sett í arvi tínum, sum tú skalt arva í landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær at ognast tað.
15 ¶ Ēitt vitni skal ikki rísa upp ímóti einum manni fyri nakra misgerð, ella fyri nakra synd, í nakrari synd sum hann syndar: við munninum á tveimum vitnum, ella við munninum á trimum vitnum, skal søkin verða grundfest.
16 ¶ Um eitt falskt vitni rísi upp ímóti nøkrum manni at vitna ímóti honum *tað sum er* rangt;
17 Tá skulu báðir menninir, ímillum hvørjar deilan *er,* standa frammi fyri HARRANUM, frammi fyri prestunum og dómarunum, sum skulu vera í teimum døgunum;
18 Og dómararnir skulu gera dúgliga avhoyring: og sí, *um* vitnið *veri* eitt falskt vitni, *og* hevur vitnað falsligani ímóti bróður sínum;
19 Tá skulu tit gera at honum, eins og hann havi hugsað at hava gjørt at bróður sínum: soleiðis skalt tú koyra hitt illa burtur tykkara millum ífrá.
20 Og teir sum eru eftir skulu hoyra, og óttast, og skulu hiðanífrá ei meira fremja nakað slíkt ilt tykkara millum.
21 Og títt eyga skal ikki várkunna; *men* lív *skal fara* fyri lív, eyga fyri eyga, tonn fyri tonn, hond fyri hond, fótur fyri fót.

KAPITUL 20

TÁ ið tú fert út til orrustu ímóti tínum fíggindum, og sært hestar, og vagnar, *og* eitt fólk fleiri enn tú, ver ikki ræddur fyri teimum: tí at HARRIN tín Guð *er* við tær, sum førdi teg upp út úr Egyptalandi.
2 Og tað skal verða, tá ið tit eru komnir í náND at orrustuni, at presturin skal nærkast og tala við fólkið,
3 Og skal siga við teir, Hoyr, O Ísrael, tit nærkast henda dag at orrustu ímóti tykkara fíggindum: latið ikki tykkara hjørtu veiklast, óttist ikki, og nøtrið ikki, eiheldur veri tit ræðsluslignir uppá grund av teimum;
4 Tí at HARRIN tykkara Guð *er* hann sum gongur við tykkum, at berjast fyri tykkum ímóti tykkara fíggindum, til at frelsa tykkum.
5 ¶ Og yvirmenninir skulu tala við fólkið, sigandi, Hvør maður *er tað* sum hevur bygt eitt nýtt hús, og hevur ikki innvígað tað? lat hann fara og venda aftur til húss síns, at ikki hann doyggi í bardaganum, og ein annar maður innvígi tað.
6 Og hvør maður *er hann* sum hevur plantað ein víngarð, og hevur ikki *enn* etið av honum?

lat hann *eisini* fara og venda aftur at húsi sínum, at ikki hann doyggi í bardaganum, og ein annar maður eti av honum.

7 Og hvør maður *er tað* sum hevur trúlovað *seg við* einum vívi, og hevur ikki tikið hana? lat hann fara og venda aftur at húsi sínum, at ikki hann doyggi í bardaganum, og ein annar maður taki hana.

8 Og yvirmenninir skulu tala víðari við fólkið, og teir skulu siga, Hvør maður *er tað sum er* óttafullur og veikhjartaður? lat hann fara og venda aftur at húsi sínum, at ikki hjarta brøðra hansara veiklist eins væl og hjarta hansara.

9 Og tað skal verða, tá ið yvirmenninir hava lokið við at tala við fólkið, at teir skulu gera høvuðsmenn hjá herunum til at leiða fólkið.

10 ¶ Tá ið tú kemurt í nánd at einum staði at berjast ímót honum, tá kunnger frið at honum.

11 Og tað skal verða, um hann inni tær friðarsvar, og opni at tær, tá skal tað verða, *at* alt fólkið, *sum er* funnið hart, skulu vera skattskyldigir at tær, og teir skulu tæna tær.

12 Og um hann ongan frið vil gera við teg, men vil føra kríggj ímót tær, tá skalt tú kringseta hann:

13 Og tá ið HARRIN tín Guð hevur flýggjað hann inn í hendur tínar, skalt tú sláa hvørt kallkyn harav við svørðeggini:

14 Men kvinnurnar, og hini smáu, og fenaðin, og alt sum er í staðinum, *enntá* allan fong hans, skalt tú taka at tær sjálvum; og tú skalt eta fong figginda tína, sum HARRIN tín Guð hevur givið tær.

15 Svá skalt tú gera innat øllum staðunum *sum eru* sera langt burturi frá tær, sum *eru* ikki av staðunum hjá hesum tjóðunum.

16 Men av staðunum hjá hesum fólkinum, sum HARRIN tín Guð gevur tær *til* ein arv, skalt tú frelsa á lívi ongan sum andar:

17 Men tú skalt fullkomiligani oyða teir; *nevniliga*, Hittitarnar, og Amoritarnar, Cānaanitarnar, og Pê-rīz-zīt´-arnar, Hī-vīt´-arnar, og Jĕb-ŭ-sīt´-arnar; eins og HARRIN tín Guð hevur áboðið tær:

18 At teir frálæri tykkum ikki at gera eftir øllum andstygdum sínum, sum teir hava gjørt gudum sínum; so høvdu tit syndað ímóti HARRANUM Guði tykkara.

19 ¶ Tá ið tú skalt kringseta ein stað eina langa tíð, í at føra kríggj ímót honum til at taka hann, skalt tú ikki oyða trø hansara við` at tvinga eina øks ímót teimum: tí at tú kanst eta av teimum, og tú skalt ikki skera tey niður, (tí at akursins træ *er lív* mans,) til at takast við *hjá teimum* í kringsetingini:

20 Einans trøini, sum tú veitst at tey *veri* ikki trø til matnað, tú skalt oyða og skera tey niður; og tú skalt byggja hervirkir ímóti staðinum sum førir kríggj við teg, inntil hann verði undirlagdur.

KAPITUL 21

UM *ēin* verði funnin vigin í landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær at ognast tað, liggjandi á markini, *og* tað veri ikki vitað hvør hevur vigið hann:

2 Tá skulu tínir elstu og tínir dómarar koma fram, og teir skulu máta at staðunum sum *eru* rundan um hann sum er vigin:

3 Og tað skal verða, *at* staðurin *sum er* næstur at tí vigna manninum, enntá teir elstu úr tí staðinum skulu taka eina kvígu, sum hevur ikki verðið arbeidd við, *og* sum hevur ikki drigið inn okið;

4 Og teir elstu úr tí staðinum skulu føra oman kvíguna at einum knortlutum dali, sum er hvørki veltur ella sáaður, og skulu høgga av hálsin á kvíguni har í dalinum:

5 Og prestarnir, synirnir hjá Levī, skulu koma nær; tí at teir hevur HARRIN tín Guð valt at tæna at sær, og at vælsigna í navni HARRANS; og eftir teirra orði skal hvør deila og hvørt høgg verða *roynt:*

6 Og allir teir elstu úr tí staðinum, *sum eru* næstir at tí vigna *manninum,* skulu tváa sínar hendur yvir kvíguni sum er avhøvdað í dalinum:

7 Og teir skulu taka til orða og siga, Várar hendur hava ikki helt hetta blóð, eiheldur hava eygu vári sæð *tað*.

8 Ver miskunnarfullur, O HARRI, yvirfyri fólki tínum Ísrael, sum tú hevurt endurloyst, og legg ikki sakleyst blóð at fólks tíns, Ísraels, rokning. Og blóðið skal verða fyrigivið teimum.

9 Soleiðis skalt tú koyra burtur *skyldina av* sakleysum blóði tykkara millum ífrá, tá ið tú skalt gera *tað sum er* rætt í eygsjón HARRANS.

10 ¶ Tá ið tú fert út til orrustu ímóti tínum fíggindum, og HARRIN tín Guð hevur flýggjað teir inn í hendur tínar, og tú hevurt tikið teir *til* fanga,

11 Og sært millum fanganna eina vakra kvinnu, og hevurt eina tráan at henni, at tú vildirt havt hana til ektakonu tína;

12 Tá skalt tú føra hana heim til húss tíns; og hon skal raka høvur sítt, og klippa negl sínar;

13 Og hon skal koyra klædnaðin av sínum fangaskapi uttan av sær, og skal verða verandi í húsi tínum, og gráta faðir sín og móður sína ein fullan mánað: og eftir tað skalt tú fara inn at henni, og vera ektamaður hennara, og hon skal vera ektakona tín.

14 Og tað skal verða, um tú onga fragd havi í henni, so skalt tú lata hana fara hvagar hon vil; men tú skalt ikki selja hana yvirhøvur fyri pening, tú skalt ikki gera handilsskap úr henni, av tí at tú hevurt eyðmýkt hana.

15 ¶ Um ein maður havi tvær ektakonur, ēina elskaða, og eina aðra hataða, og tær havi borið honum børn, *bæði* hin elskaða og hin hataða; og *um* hin frumborni sonurin veri hennara sum varð hatað:

16 Tá skal tað verða, tá ið hann fær synir sínar at arva *tað* sum hann hevur, *at* hann má ikki gera sonin hjá tí elskaðu frumbornan framum sonin hjá tí hataðu, *sum í roynd og veru er* hin frumborni:

17 Men hann skal viðurkenna sonin hjá tí hataðu *sum* hin frumborna, við at geva honum ein tvífaldan skamt av øllum sum hann hevur: tí at hann *er* byrjanin av hansara styrki; rætturin hjá tí frumborna *er* hansara.

18 ¶ Um ein maður havi ein treiskan og uppreistrarsaman son, sum vil ikki lýða rødd faðirs síns, ella rødd móður sínar, og *sum,* tá ið tey hava agað hann, vil ikki geva gætur at teimum:

19 Tá skulu faðir hansara og móður hansara leggja hald á hann, og føra hann út at teimum elstu av staði hansara, og at portrinum av plássi hansara;

20 Og tey skulu siga við hinar elstu av staði hansara, Hesin sonur okkara *er* treiskur og uppreistrarsamur, hann vil ikki lýða rødd okkara; *hann er* ein átari, og ein drykkjumaður.

21 Og allir menninir úr staði hansara skulu steina hann við steinum, at hann doyggi: soleiðis skalt tú koyra illskap burtur tykkara millum ífrá; og alt Ísrael skal hoyra, og óttast.

22 ¶ Og um ein maður havi framt eina synd, verdig til deyða, og hann eigi at verða tikin av lívi, og tú hangi hann á eitt træ:

23 Hansara likam skal ei verða verandi alla nátt uppiá træinum,

men tú skalt í øllum vísi jarða hann tann dagin; (tí at hann, sum *er* hongdur, er bannaður av Guði;) at títt land verði ikki dálkað, sum HARRIN tín Guð gevur tær *til* ein arv.

KAPITUL 22

TÚ skalt ikki síggja oksa bróðurs tíns ella seyð hansara fara á strok, og fjala teg frá teimum: tú skalt í øllum føri føra tey aftur at bróður tínum.

2 Og um bróðir tín *veri* ikki í námind at tær, ella um tú kenni hann ei, so skalt tú fara við honum at egna húsi tínum, og hann skal vera hjá tær inntil bróðir tín søki eftir honum, og tú skalt bøta hann til hansara aftur.

3 Á líkan hátt skalt tú gera við asna hansara; og soleiðis skalt tú gera við klædnað hansara; og við alt burturmist ting hjá bróður tínum, sum hann hevur mist burtur, og tú hevurt funnið, skalt tú gera líkaleiðis: tú mást ikki fjala teg.

4 ¶ Tú skalt ikki síggja asna bróðurs tíns ella oksa hans falla niður við vegin, og fjala teg fyri teimum: tú skalt vissuliga hjálpa honum at lyfta *teir* upp aftur.

5 ¶ Kvinnan skal ikki vera í tí sum tilkemur einum kallmanni, eiheldur skal ein kallmaður fara í plagg hjá eini kvinnu: tí at øll, sum gera soleiðis, *eru* andstygd at HARRANUM Guði tínum.

6 ¶ Um reiðrið hjá fugli vilji til at vera frammanfyri tær á veginum í nøkrum træi, ella á jørðini, *hvørt teir veri seg* ungar, ella eggˇ, og móðirin sitandi uppiá ungunum, ella uppiá eggunum, tú skalt ikki taka móðurina við ungunum:

7 *Men* tú skalt í øllum vísi lata móðurina fara, og taka ungarnar til tín; at tað má vera væl *statt* hjá tær, og *at* tú mást framleingja dagar *tínar*.

8 ¶ Tá ið tú byggirt eitt nýtt hús, tá skalt tú gera eitt rimaverk til tekju tína, at tú føri ikki blóð uppá hús títt, um nakar maður falli haðani frá.

9 ¶ Tú skalt ikki sáa víngarð tín við ymsum sáðum: at ikki ávøksturin av tínum sáði sum tú hevurt sáað, og ávøksturin av tínum víngarði, verði dálkaður.

10 ¶ Tú skalt ikki pløga við einum oksa og einum asna saman.

11 ¶ Tú skalt ikki vera í einum klæði úr ymsum sløgum, *eins og* úr ullintum og líni saman.

12 ¶ Tú skalt gera tær frynsar uppá hinar fýra fjórðingar kappa tíns, við hvørjum tú dekkart *teg sjálvan*.

13 ¶ Um nakar maður taki eina ektakonu, og fari inn at henni, og hati hana,

14 Og gevi tilevnir til talu ímóti henni, og føri upp eitt ilt navn uppá hana, og sigi, Eg tók hesa kvinnu, og tá ið eg kom til hennara, fann eg hana ikki eina moyggj:

15 So skal faðirin at gentuni, og móðir hennara, taka og koma við *teknunum av* jomfrúdómi gentunnar at hinum elstu staðarins í portrinum:

16 Og faðir gentunnar skal siga við hinar elstu, Eg gav hesum manni mína dóttur til ektakonu, og hann hatar hana;

17 Og sí, hann hevur givið tilevnir til talu *ímóti henni*, sigandi, Eg fann ikki tína dóttur eina moyggj; og tó, hetta *eru teknini av* jomfrúdómi dóttur mínar. Og teir skulu breiða klæðið frammi fyri hinum elstu staðarins.

18 Og hinir elstu av tí staðinum skulu taka handa mannin og aga hann;

19 Og teir skulu sekta hann í eitt hundrað *sjëˇkl-um* av silvuri, og geva *teir* at faðirinum at gentuni, av tí at hann hevur ført upp

eitt ilt navn uppá eina jomfrú Ísraels: og hon skal vera kona hansara; hann má ikki koyra hana burtur allar dagar sínar.

20 Men um hetta tingið veri satt, *og teknini av* jomfrúdómi verði ikki funnin fyri gentuna:

21 Tá skulu teir føra út gentuna at hurðini á húsi faðirs hennara, og menninir úr staði hennara skulu steina hana við steinum, at hon doyggi: av tí at hon hevur virkað dárskap í Ísrael, *í* at spæla horan í húsi faðirs síns: soleiðis skalt tú koyra illskap burtur tykkara millum ífrá.

22 ¶ Um ein maður verði funnin liggjandi við eini kvinnu, gift við einum ektamanni, tá skulu tey bæði av teimum doyggja, *bæði* maðurin sum lá við kvinnuni, og kvinnan: soleiðis skalt tú koyra burtur illskap frá Ísrael.

23 ¶ Um ein genta, *sum er* ein jomfrú, veri trúlovað einum ektamanni, og ein maður finni hana í staðinum, og liggi við henni;

24 Tá skulu tit føra tey bæði út at portrinum av tí staðinum, og tit skulu steina tey við steinum, at tey doyggi; gentuna, av tí at hon geylaði ikki, *verandi* í staðinum; og mannin, av tí at hann hevur eyðmýkt ektakonu næsta síns: soleiðis skalt tú koyra burtur illskap tykkara millum ífrá.

25 ¶ Men um ein maður finni eina trúlovaða gentu í akrinum, og maðurin noyði hana, og liggi við henni: tá skal maðurin einans, sum lá við henni, doyggja:

26 Men gentuni skalt tú einkið gera; *tað er* í gentuni eingin synd *verd* til deyða: tí eins og tá ið ein maður rísur ímóti næsta sínum, og vegur hann, enntá soleiðis *er* hetta mál:

27 Tí hann fann hana í akrinum, *og* tann trúlovaða gentan geylaði, og *tað var* eingin at bjarga henni.

28 ¶ Um ein maður finni eina gentu *sum er* ein jomfrú, sum er ikki trúlovað, og leggi hald á hana, og liggi við henni, og tey verði funnin;

29 Tá skal maðurin, sum lá við henni, geva faðirinum at gentuni fimti *sjē´-kl-ar* av silvuri, og hon skal vera kona hansara; av tí at hann hevur eyðmýkt hana, hann má ikki koyra hana burtur allar dagar sínar.

30 ¶ Ein maður skal ikki taka ektakonu faðirs síns, ella avdekka skeyti faðirs síns.

KAPITUL 23

HANN sum er særdur í steinunum, ella hevur sín privata lim skornan av, skal ikki innfara inn í samkomu HARRANS.

2 Ein horuungi skal ikki innfara inn í samkomu HARRANS; enntá til hansara tíggjunda ættarlið skal hann ikki innfara inn í samkomu HARRANS.

3 Ein Ammoniti ella Móabiti skal ikki innfara inn í samkomu HARRANS; enntá til teirra tíggjunda ættarlið skulu teir ikki innfara inn í samkomu HARRANS um ævir:

4 Av tí at teir møttu tykkum ikki við breyði og við vatni á veginum, tá ið tit komu fram út úr Egyptalandi; og av tí at teir leigaðu ímóti tær Bá´-lāām Bē´-ōr-s son úr Pē´-thōr Mê-sô-pô-tá´-mĭ-ŭ, at banna teg.

5 Hóast hetta, HARRIN tín Guð vildi ikki geva gætur at Bá´-lāām-i; men HARRIN tín Guð vendi banningini í eina signing at tær, av tí at HARRIN tín Guð elskaði teg.

6 Tú skalt ikki søkja teirra frið, ella teirra framgongd, allar dagar tínar um ævir.

7 ¶ Tær skal ikki standast við ein Ē´-dóm-ĭt; tí at hann *er* bróðir tín: tær skal ikki standast við

ein Egypta; av tí at tú vart ein fremmandur í landi hansara.

8 Børnini, sum eru gitin av teimum, skulu innfara inn í samkomu HARRANS í triðja ættarliði sínum.

9 ¶ Tá ið herliðið fer fram ímóti figgindum tínum, tá halt teg frá hvørjum vondum luti.

10 ¶ Um tað veri tykkara millum nakar maður, sum er ikki reinur uppá grund av óreinsku, sum vil honum til um nátt*ina,* tá skal hann fara útum út úr leirinum, hann skal ikki koma innum leirin:

11 Men tað skal verða, tá ið kvøld kemur á, skal hann tváa *sær* við vatni: og tá ið sólin er niðri, skal hann koma inn í leirin *aftur*.

12 ¶ Tú skalt hava eitt pláss eisini uttanfyri leirin, hvagar tú skalt fara fram útum:

13 Og tú skalt hava ein spaðal uppiá tínum vápini; og tað skal verða, tá ið tú vilt lætta tær sjálvum útium, skalt tú grava harvið, og skalt venda aftur og dekka tað sum kemur frá tær:

14 Tí at HARRIN tín Guð gongur í miðjum leiri tínum, til at bjarga tær, og at geva upp tínar figgindar frammi fyri tær; tí skal tín leirur vera heilagur: at hann ongan óreinan lut síggi í tær, og vendi burtur frá tær.

15 ¶ Tú skalt ikki flýggja innat hansara meistara tænaran sum hevur komist undan frá meistara sínum at tær:

16 Hann skal búgva hjá tær, *enntá* tykkara millum, í tí plássinum sum hann skal velja í ēinum av portrum tínum, har tað líkar honum best: tú skalt ikki kúga hann.

17 ¶ Tað skal eingin hora vera av døtrum Ísraels, ella ein Sodomitur av sonum Ísraels.

18 Tú skalt ikki koma við hýruni hjá eini horu, ella prísinum á einum hundi, inn í hús HARRANS Guðs tíns fyri nakað heiti: tí at enntá bæði hesi *eru* andstygd at HARRANUM Guði tínum.

19 ¶ Tú skalt ikki læna uppá fæleigu til bróður tíns; fæleigu av peningi, fæleigu av vistum, fæleigu av nøkrum sum verður lænt uppá fæleigu:

20 At einum fremmandum kanst tú læna uppá fæleigu; men at tínum bróður skalt tú ikki læna uppá fæleigu: at HARRIN tín Guð má vælsigna teg í øllum sum tú seturt hond tína til í landinum, hvagar tú fert at ognast tað.

21 ¶ Tá ið tú skalt streingja eitt heiti at HARRANUM Guði tínum, tú skalt ikki slaka *í* at rinda tað: tí at HARRIN tín Guð vil vissuliga krevja tað av tær; og tað vildi verið synd *inni* í tær.

22 Men um tú skalt lata vera við at streingja, tað skal eingin synd vera *inni* í tær.

23 Tað, sum er farið út av varrum tínum, skalt tú halda og útinna; *enntá* eitt fríviljaoffur, samsvarandi sum tú hevurt strongt at HARRANUM Guði tínum, sum tú hevurt lovað við tínum munni.

24 ¶ Tá ið tú kemurt inn í víngarð næsta tíns, tá kanst tú eta víndrúvur tína mettu við tína egnu lyst; men tú skalt ikki koyra *nakrar* í ker títt.

25 Tá ið tú kemurt inn í tað standandi kornið hjá næsta tínum, tá kanst tú slíta øksini við tíni hond; men tú skalt ikki flyta ein akurknív at standandi korni næsta tíns.

KAPITUL 24

TÁ ið ein maður hevur tikið eina ektakonu, og gift seg við henni, og tað beri á, at hon einkið yndi finni í eygum hans, av tí at hann hevur funnið onkran óreinleika í henni: tá lat hann

skriva henni eitt skilnaðarskriv, og geva *tað* í hennara hond, og senda hana út úr húsi sínum.

2 Og tá ið hon er farin avstað út úr húsi hansara, kann hon fara og vera *kona* annars mans.

3 Og *um* hin seinni ektamaðurin hati hana, og skrivi henni eitt skilnaðarskriv, og gevur *tað* í hond hennara, og sendir hana út úr húsi sínum; ella um hin seinni ektamaðurin doyggi, sum tók hana *til at vera* ektakona sín;

4 Hennara fyrri ektamaður, sum sendi hana burtur, má ikki taka hana aftur til at vera ektakona hansara, eftir at hon er dálkað; tí at tað *er* andstygd frammi fyri HARRANUM: og tú skalt ikki elva landinum at synda, sum HARRIN tín Guð gevur tær *til* ein arv.

5 ¶ Tá ið ein maður hevur tikið eina nýggja ektakonu, hann skal ikki fara út til orrustu, eiheldur skal hann verða álagdur við nøkrum gerningi: *men* hann skal vera fríur heima ēitt ár, og skal uppgleða sína ektakonu sum hann hevur tikið.

6 ¶ Eingin maður skal taka hin niðara ella hin ovara kvarnarstein til pants: tí at hann tekur lívið *hjá einum manni* til pants.

7 ¶ Um ein maður verði funnin stjalandi nakran av brøðrum sínum av børnum Ísraels, og ger handilsskap úr honum, ella selur hann; tá skal hasin tjóvurin doyggja; og tú skalt koyra ilt burtur tykkara millum ífrá.

8 ¶ Ansa eftir í spitalsknispláguni, at tú gevi ans dúgligani, og geri samsvarandi við alt sum prestarnir, Levitarnir, skulu frálæra tykkum: eins og eg ábeyð teimum, *soleiðis* skulu tit geva ans eftir at gera.

9 Minst til hvat HARRIN tín Guð gjørdi at Mirjami eftir veginum, eftir at tit vóru komnir fram út úr Egyptalandi.

10 ¶ Tá ið tú lænirt bróður tínum nakað, skalt tú ikki fara inn í hús hansara at heinta pant hansara.

11 Tú skalt standa útium, og maðurin, til hvørs tú lænirt, skal føra út pantið útum at tær.

12 Og um maðurin *veri seg* fátækur, skalt tú ikki sova við panti hansara:

13 Í øllum føri skalt tú flýggja honum pantið aftur, tá ið sólin fer niður, at hann má sova í sínum egna klædnaði, og vælsigna teg: og tað skal vera rættvísi at tær frammi fyri HARRANUM Guði tínum.

14 ¶ Tú skalt ikki kúga ein leigaðan tænara *sum er* fátækur og tørviligur, *hvørt hann veri seg* av brøðrum tínum, ella av tínum fremmandu sum *eru* í landi tínum innanfyri portur tíni:

15 Á hansara degi skalt tú geva *honum* hýru hansara, eiheldur skal sólin fara niður uppá hana; tí at hann *er* fátækur, og setur sítt hjarta uppá hana: at ikki hann rópi ímóti tær at HARRANUM, og tað veri synd at tær.

16 Fedrarnir skulu ikki verða tiknir av lívi fyri børnini, eiheldur skulu børnini verða tikin av lívi fyri fedrarnar: hvør maður skal verða tikin av lívi fyri sína egnu synd.

17 ¶ Tú skalt ikki spilla dómin hjá tí fremmanda, *ella* hjá tí faðirleysa; ella taka klædnaðin hjá eini einkju til pants:

18 Men tú skalt minnast til at tú vart eitt trælmenni í Egyptalandi, og HARRIN tín Guð endurloysti teg haðani: tí skipi eg tær at gera henda lut.

19 ¶ Tá ið tú skert niður heyst títt í akri tínum, og hevurt gloymt eitt bundi í akrinum, skalt tú ei fara aftur at heinta tað: tað skal vera til hin fremmanda, til hin faðirleysa, og til einkjuna:

at HARRIN tín Guð má vælsigna teg í øllum verki handa tína.

20 Tá ið tú slært olivintræ títt, skalt tú ei fara yvir greinarnar aftur: tað skal vera til hin fremmanda, til hin faðirleysa, og til einkjuna.

21 Tá ið tú hentart víndrúvurnar av víngarði tínum, skalt tú ikki fínhenta *hann* aftaná: tað skal vera til hin fremmanda, til hin faðirleysa, og til einkjuna.

22 Og tú skalt minnast til, at tú vart eitt trælmenni í Egyptalandi: tessvegna skipi eg tær at gera henda lut.

KAPITUL 25

UM tað veri ein deila ímillum menn, og teir komi at dómi, at *dómararnir* mega døma teir; tá skulu teir rættvísgera hin rættvísa, og fordøma tann vonda.

2 Og tað skal verða, um hin vondi maðurin *veri seg* verdigur til at verða sligin, at dómarin skal elva honum at leggjast niður, og at verða sligin frammi fyri andliti sínum, samsvarandi við hansara feil, við einum ávísum tali.

3 Fjøruti sløg kann hann geva honum, *og* ei fara yvir: at ikki, *um* hann skuldi farið yvir, og slái hann uppum hesi við mongum fleingjum, tá bróðir tín skuldi tóktst lakur at tær.

4 ¶ Tú skalt ikki múlabinda oksan, tá ið hann treskir út *korn-ið*.

5 ¶ Um brøður búgvi saman, og ēin teirra doyggi, og einkið barn havi, ektakonan hjá tí deyða skal ikki giftast uttanfyri at einum fremmandum: bróðir ektamans hennara skal fara inn at henni, og taka hana til sín til ektakonu, og inna skylduna hjá bróður ektamans at henni.

6 Og tað skal verða, *at* hin frumborni sum hon føðir skal avloysa í navni bróðurs hansara *sum er* deyður, at hansara navn ei verði strúkað út úr Ísrael.

7 Og um manninum hóvi ikki at taka ektakonu bróðurs síns, tá lat ektakonu bróðurs hansara fara niðan til portrið at hinum elstu, og siga, Bróðir ektamans míns noktar at reisa upp bróður sínum navn í Ísrael, hann vil ikki inna skylduna hjá bróður ektamans míns.

8 Tá skulu teir elstu úr tí staði kalla hann, og tala við hann: og *um* hann standi *við tað*, og sigi, Mær hóvar ikki at taka hana;

9 Tá skal ektakona bróðurs hansara koma at honum í nærveru hinna elstu, og loysa hansara skógv uttan av fóti hansara, og spíta í andlit hansara og skal taka til orða og siga, Soleiðis skal tað verða gjørt at tí manni sum vil ikki byggja upp hús bróðurs síns.

10 Og hansara navn skal verða kallað í Ísrael, Húsið hjá honum sum hevur skógv sín loystan.

11 ¶ Tá ið menn stríði saman hvør við annan, og konan hjá tí ēina dregst nær fyri at útfría sín ektamann út úr hondini á honum sum slær hann, og setur fram sína hond, og tekur hann eftir loyndunum:

12 Tá skalt tú skera av hennara hond, títt eyga skal ikki várkunna *henni*.

13 ¶ Tú skalt ikki hava í tínum posa ymsar vektir, eina mikla og eina smáa.

14 Tú skalt ikki hava í tínum húsi ymis mát, eitt mikið og eitt smátt.

15 *Men* tú skalt hava eina fullkomna og rættláta vekt, eitt fullkomið og rættlátt mát skalt tú hava: at tínir dagar mega verða longdir í landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær.

16 Tí at allir sum gera slíkar lutir, *og* allir sum gera órættvísliga, *eru* ein andstygd yvirfyri HARRANUM Guði tínum.

17 ¶ Minst til hvat Á-mâ-lĕk gjørdi at tær eftir veginum, tá ið tit vóru komnir fram út úr Egyptalandi;
18 Hvussu hann møtti tær eftir veginum, og sló hinar aftastu hjá tær, *enntá* allar *sum vóru* ússaligir aftanfyri teg, tá ið tú *vart* veikur og útlúgvaður; og hann óttaðist ikki Guð.
19 Tí skal tað verða, tá ið HARRIN tín Guð hevur givið tær hvílu frá øllum tínum fíggindum runt umkring, í landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær *til* ein arv at ognast tað, *at* tú skalt sletta út minnið um Á-mâlĕk undan himni; tú skalt ikki gloyma *tað*.

KAPITUL 26

OG tað skal verða, tá ið tú *ert* komin inn at landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær *til* ein arv, og ognast tað, og býrt harí;
2 At tú skalt taka av tí fyrsta av øllum ávøkstinum av jørðini, sum tú skalt koma við av landi tínum sum HARRIN tín Guð gevur tær, og skalt koyra *tað* í eina kurv, og skalt fara at plássinum sum HARRIN tín Guð skal velja at staðseta navn sítt har.
3 Og tú skalt fara at prestinum sum skal vera í teimum døgum, og siga við hann, Eg játti henda dag at HARRANUM Guði tínum, at eg eri komin at landinum sum HARRIN svór okkara fedrum til tess at geva okkum.
4 Og presturin skal taka tæguna úr tíni hond, og seta hana niður frammanfyri altar HARRANS Guðs tíns.
5 Og tú skalt tala og siga frammi fyri HARRANUM Guði tínum, Ein Sýriulendingur, um at týnast, *var* faðir mín, og hann fór niður inn í Egyptaland, og útisat har við nøkrum fáum, og gjørdist har ein tjóð, mikil, mektig, og fólkarík:
6 Og Egyptarnir ónt fóru við okkum, og kvøljaðu okkum, og løgdu uppá okkum harðan trældóm:
7 Og tá ið vit róptu á HARRAN Guð fedra vára, HARRIN hoyrdi vára rødd, og hugdi á vára nívd, og strev várt, og kúgan vára:
8 Og HARRIN førdi okkum fram út úr Egyptalandi við eini mektigari hond, og við einum útstrektum armi, og við miklum øgiligleika, og við teknum, og við undrum:
9 Og hann hevur ført okkum inn í hetta plássið, og hevur givið okkum hetta landið, *enntá* eitt land sum flýtur við mjólk og hunangi.
10 Og nú, sí, eg eri komin við frumávøkstunum av landinum sum tú, O HARRI, hevurt givið mær. Og tú skalt seta tað framfyri HARRAN Guð tín, og tilbiðja frammi fyri HARRANUM Guði tínum:
11 Og tú skalt fegnast í hvørjum góðum *tingi* sum HARRIN tín Guð hevur givið at tær, og innat tínum húsi, tú, og Levitin, og hin fremmandi sum *er* tykkara millum.
12 ¶ Tá ið tú hevurt lokið við at tíggjunda allar tíggjundirnar av tíni grøði tað triðja árið, *sum er* árið av tíggjundan, og hevurt givið *tað* innat Levitanum, hinum fremmanda, hinum faðirleysa, og einkjuni, at tey mega eta innanfyri portur tíni, og verða mettaði;
13 Tá skalt tú siga frammi fyri HARRANUM Guði tínum, Eg havi ført burtur tey halgaðu tingini út úr húsi *mínum*, og eisini havi givið tey innat Levitanum, og hinum fremmanda, til hin faðirleysa, og til einkjuna, samsvarandi við øll tíni boð sum tú hevurt áboðið mær: eg havi ikki mis-

brotið boðini hjá tær, eiheldur havi eg gloymt *tey:*
14 Eg havi ikki etið harav í míni harman, eiheldur havi eg tikið burt *nakað* harav til *nakað* óreint *brúk,* ella givið *nakað* harav til tey deyðu: *men* eg havi givið gætur eftir rødd HARRANS Guðs míns, *og* havi gjørt samsvarandi við alt sum tú hevurt áboðið mær.
15 Hygg niður frá tínum heilaga bústaði, frá himni, og vælsigna títt fólk Ísrael, og landið sum tú hevurt givið okkum, eins og tú svórt innat fedrum várum, eitt land sum flýtur við mjólk og hunangi.
16 ¶ Henda dag hevur HARRIN tín Guð áboðið tær at gera hesar ásetingar og dómar: tú skalt tí halda og gera tey við øllum hjarta tínum, og við allari sál tíni.
17 Tú hevurt váttað HARRANUM henda dag at vera tín Guð, og at ganga í hansara vegum, og at halda hans ásetingar, og hansara boðˇ, og hansara dómar, og at lýða rødd hansara:
18 Og HARRIN hevur váttað tær henda dag at vera hansara seregna fólk, eins og hann hevur fyrijáttað tær, og at *tú* skuldirt halda øll hansara boð;
19 Og at gera teg høgt omanfyri allar tjóðir sum hann hevur gjørt, í lovi, og í navni, og í heiðuri; og at tú mást vera eitt heilagt fólk at HARRANUM Guði tínum, eins og hann hevur talað.

KAPITUL 27

OG Móses við hinum elstu av Ísrael ábjóðaði fólkinum, sigandi, Haldið øll boðini sum eg ábjóði tykkum henda dag.
2 Og tað skal verða á tí degi tá ið tit skulu fara yvirum Jordan at landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær, at tú skalt seta tær upp miklar steinar, og sparsla teir við sparsli:
3 Og tú skalt skriva uppá teir øll orðini av hesi lóg, tá ið tú ert farin yvirum, at tú mást fara inn at landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær, eitt land sum flýtur við mjólk og hunangi; eins og HARRIN Guð fedra tína hevur fyrijáttað tær.
4 Tí skal tað verða, tá ið tit verði farnir yvirum Jordan, *at* tit skulu seta upp hesar steinar, sum eg ábjóði tykkum henda dag, á Ē′-băl fjalli, og tú skalt sparsla teir við sparsli.
5 Og har skalt tú byggja eitt altar at HARRANUM Guði tínum, eitt altar av steinum: tú skalt ikki lyfta upp *nakað* jarn *amboð* uppá teir.
6 Tú skalt byggja altar HARRANS Guðs tíns av heilum steinum: og tú skalt ofra brennioffurˇ hará at HARRANUM Guði tínum:
7 Og tú skalt ofra friðoffurˇ, og skalt eta har, og fegnast frammi fyri HARRANUM Guði tínum.
8 Og tú skalt skriva uppá steinarnar øll orðini av hesi lóg sera greiniliga.
9 ¶ Og Móses og prestarnir, Levitarnir, talaðu við alt Ísrael, sigandi, Gev gætur, og lýð á, O Ísrael; henda dag ert tú vorðin fólk HARRANS Guðs tíns.
10 Tú skalt tí akta rødd HARRANS Guðs tíns, og gera hansara boðˇ og hans ásetingar, sum eg ábjóði tær henda dag.
11 ¶ Og Móses álegði fólkinum hin sama dagin, sigandi,
12 Hesir skulu standa uppiá Gĕ-rī′-zĭm fjalli til at vælsigna fólkið, tá ið tit eru komnir yvirum Jordan; Símeon, og Levī, og Judah, og Ĭs′-să-chăr, og Jóseph, og Benjamin:
13 Og hesir skulu standa uppiá Ē′-băl fjalli til at banna; Reūben, Gád, og Ásjer, og Zē′-bŭ-lŏn, Dán, og Năph′-tâ-lī.

14 ¶ Og Levitarnir skulu tala, og siga við allar Ísraels menn við harðari reyst,
15 Bannaður *veri* tann maður, sum ger *nakra* rista ella brædda mynd, HARRANUM andstygd, verkið av handverkarans hondum, og setur *hana* í *eitt* loyniligt *plass*. Og alt fólkið skal svara og siga, Á́-měn.
16 Bannaður *veri* hann, sum ger lítið úr faðir sínum, ella móður síni. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
17 Bannaður *veri* hann, sum burtflytur markaskil næsta síns. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
18 Bannaður *veri* hann, sum fær hin blinda at reika út av veginum. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
19 Bannaður *veri* hann, sum spillir dómin hjá tí fremmanda, faðirleysa, og einkju*ni*. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
20 Bannaður *veri* hann, sum liggur við ektakonu faðirs síns; av tí at hann avhylur skeyti faðirs síns. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
21 Bannaður *veri* hann, sum liggur við nøkrum háttarlagi av djóri. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
22 Bannaður *veri* hann, sum liggur við systur síni, dóttur faðirs síns, ella dóttur móður sínar. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
23 Bannaður *veri* hann, sum liggur við vermóður síni. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
24 Bannaður *veri* hann, sum slær næsta sín loyniliga. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
25 Bannaður *veri* hann, sum tekur endurgjald til at bana einum ósekum persóni. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.
26 Bannaður *veri* hann, sum staðfestir ikki *øll* orðini av hesi lóg at gera tey. Og alt fólkið skal siga, Á́-měn.

KAPITUL 28

OG tað skal bera á, um tú skalt dúgliga lýða á rødd HARRANS Guðs tíns, at gáa eftir *og* at gera øll hansara boð sum eg ábjóði tær henda dag, at HARRIN tín Guð vil seta teg til hæddar uppum allar tjóðir jarðarinnar:
2 Og allar hesar signingar skulu koma á teg, og innheinta teg, um tú skalt lýða á rødd HARRANS Guðs tíns.
3 Vælsignaður *skalt* tú *vera* í staðinum, og vælsignaður *skalt* tú *vera* í akrinum.
4 Vælsignaður *skal vera* ávøkstur likams tíns, og ávøkstur jarðar tínar, og ávøkstur fenaðar tíns, økingin av tínum kúm, og fylgini av tínum seyði.
5 Vælsignað *skal vera* tæga tín og goymsla tín.
6 Vælsignaður *skalt* tú *vera* tá ið tú kemurt inn, og vælsignaður *skalt* tú *vera* tá ið tú fert út.
7 HARRIN skal elva tínum figgindum, sum rísa upp ímóti tær, at verða slignum frammi fyri andliti tínum: teir skulu koma út ímóti tær ein veg, og flýggja frammi fyri tær sjey vegir.
8 HARRIN skal ábjóða signingina uppá teg í goymsluhúsum tínum, og í øllum sum tú seturt hond tína at; og hann skal vælsigna teg í landinum sum HARRIN tín Guð gevur tær.
9 HARRIN skal grundfesta teg eitt heilagt fólk yvirfyri sær sjálvum, eins og hann hevur svorið at tær, um tú skalt halda boðini hjá HARRANUM Guði tínum, og ganga í hansara vegum.
10 Og øll fólk jarðarinnar skulu síggja, at tú ert kallaður eftir navni HARRANS; og tey skulu vera rædd fyri tær.
11 Og HARRIN skal gera teg ríkiligsaman í góðsi, í ávøksti likams tíns, og í ávøksti fenaðar

tíns, og í ávøksti jarðar tínar, í landinum sum HARRIN svór tínum fedrum at geva tær.

12 HARRIN skal opna tær sín góða skatt, himinin til at geva tínum landi regnið í tíð tess, og til at vælsigna alt verk handar tínar: og tú skalt útlána mongum tjóðum, og tú skalt ikki læna.

13 Og HARRIN skal gera teg *til* høvdið, og ikki halan; og tú skalt vera omanfyri einans, og tú skalt ikki vera niðanfyri; um at tú lýði á boðini hjá HARRANUM Guði tínum, sum eg ábjóði tær henda dag, at geva ans eftir *teimum* og at gera *tey:*

14 Og tú skalt ikki fara til viks frá nøkrum av orðunum sum eg ábjóði tær henda dag, *til* hinnar høgru handar, ella *til* hinnar vinstru, at fara eftir øðrum gudum at tæna teimum.

15 ¶ Men tað skal bera á, um tú vilt ikki lýða á rødd HARRANS Guðs tíns, at geva ans eftir at gera øll hansara boð og hans ásetingar sum eg ábjóði tær henda dag; at allar hesar banningar skulu koma uppá teg, og innheinta teg:

16 Bannaður *skalt* tú *vera* í staðinum, og bannaður *skalt* tú *vera* í akrinum.

17 Bannað *skal vera* tæga tín og goymsla tín.

18 Bannaður *skal vera* ávøkstur likams tíns, og ávøkstur jarðar tínar, økingin av tínum kúm, og fylgini av tínum seyði.

19 Bannaður *skalt* tú *vera* tá ið tú kemurt inn, og bannaður *skalt* tú *vera* tá ið tú fert út.

20 HARRIN skal senda uppá teg banning, kvøljan, og hartan, í øllum sum tú seturt hond tína at fyri at gera, inntil tú verði oyddur, og inntil tú glatist fljótligani; uppá grund av vondskuni av tínum gerðum, við^ hvørjum tú hevurt yvirgivið meg.

21 HARRIN skal fáa drepsóttina at krøkjast at tær, inntil hann havi upptært teg oman av landinum, hvagar tú fert ognast tað.

22 HARRIN skal sláa teg við einum tæringi, og við eini hitasótt, og við eini brunasótt, og við eini ovurmiklari brenning, og við svørðinum, og við svartaroða, og við gulnan; og tey skulu elta teg, inntil tú týnist.

23 Og tín himin, sum *er* yvir tínum høvdi, skal vera messing, og jørðin, sum *er* undir tær, *skal vera* jarn.

24 HARRIN skal gera regnið hjá tínum landi *til* pulvur og dust: frá himni skal tað koma niður uppá teg, inntil tú verði oyddur.

25 HARRIN skal volda tær at verða slignum frammi fyri tínum figgindum: tú skalt fara út ēin veg ímóti teimum, og flýggja sjey vegir frammi fyri teimum: og skalt verða burtfluttur inn í øll kongadømir jarðarinnar.

26 Og títt ræ skal vera matur hjá øllum fuglum luftarinnar, og hjá djórum jarðarinnar, og eingin maður skal styggja *tey* burtur.

27 HARRIN skal sláa teg við svulli Egyptalands, og við hemoridunum, og við skruvuni, og við skriðanum, hvarfrá tú kanst ei verða grøddur.

28 HARRIN skal sláa teg við ørskapi, og blindleika, og hjartaógvan:

29 Og tú skalt trilva á middegi, eins og hin blindi trilvar í myrkri, og tú skalt ikki framganga í vegum tínum: og tú skalt vera einans kúgaður og rændur med alla, og eingin maður skal frelsa *teg*.

30 Tú skalt trúlova *teg við* einum vívi, og ein annar maður skal liggja við henni: tú skalt byggja eitt hús, og tú skalt ikki búgva harí: tú skalt planta ein víngarð,

og skalt ikki savna víndrúvurnar harav.

31 Tín oksi *skal verða* vigin frammi fyri eygum tínum, og tú skalt ikki eta av honum: tín asni *skal verða* harðliga tikin burtur frammi undan andliti tínum, og skal ikki verða bøttur aftur til tín: tín seyður *skal verða* givin tínum figgindum, og tú skalt ongan hava at bjarga *teimum*.

32 Tínir synir og tínar døtur *skulu verða* givin at einum øðrum fólki, og tíni eygu skulu hyggja, og bila *av longsli* eftir teimum allan dagin langan: og *tað skal* eingin megi *vera* í tíni hond.

33 Ávøkstin av tínum landi, og øll tíni strev, skal ein tjóð, sum tú ikki kennirt, eta upp; og tú skalt verða einans kúgaður og morlaður alvegis:

34 So at tú skalt verða ørur fyri sjónina hjá eygum tínum, sum tú skalt sjá.

35 HARRIN skal slá teg í knøini, og í leggirnar, við einum svárum svulli sum kann ei verða grøddur, frá ilini á tínum fótum at toppinum á tínum høvdi.

36 HARRIN skal føra teg, og tín kong sum tú skalt seta yvir tær, at eini tjóð sum hvørki tú, ella fedrar tínir, hava kent; og har skalt tú tæna øðrum gudum, viði og steini.

37 Og tú skalt gerast ein øtan, eitt orðtak, og eitt speiorð, millum alra tjóða, hvagar HARRIN skal leiða teg.

38 Tú skalt bera nógv sáð út á akurin, og skalt savna *bert* lítið inn; tí at grashoppan skal eta tað upp.

39 Tú skalt planta víngarðar, og røkja *teir,* men skalt hvørki drekka *av* víninum, ella savna *víndrúvurnar;* tí at ormarnir skulu eta teir.

40 Tú skalt hava olivintrø út gjøgnum allar útryðjur tínar, men tú skalt ikki salva *teg* við oljuni; tí at olivin títt skal kasta *ávøkst sín*.

41 Tú skalt gita synir og døtur, men tú skalt ikki njóta tey; tí at tey skulu fara inn í fangaskap.

42 Øll tíni trø og ávøkstin av tínum landi skal grashoppan eta upp.

43 Hin fremmandi, sum *er* fyri innan tín, skal fara upp uppum teg sera hátt; og tú skalt koma niður sera lágt.

44 Hann skal læna til tín, og tú skalt ikki læna til hansara: hann skal vera høvdið, og tú skalt vera halin.

45 Harafturat skulu allar hesar banningar koma uppá teg, og skulu elta teg, og innheinta teg, til tú verði oyddur; av tí at tú lýddirt ikki rødd HARRANS Guðs tíns, at halda hansara boð˙ og hans ásetingar sum hann skipaði tær:

46 Og tær skulu vera uppiá tær til eitt tekin og til eitt undur, og uppiá tínum sáði um ævir.

47 Av tí at tú tæntirt ikki HARRANUM Guði tínum við frødligsemi, og við hjartagleði, fyri ríkiligsemina av øllum *tingum;*

48 Tí skalt tú tæna tínum figgindum, sum HARRIN skal senda ímóti tær, í hungri, og í torsta, og í nakni, og í troti á øllum *tingum:* og hann skal koyra eitt ok av jarni uppá tín háls, inntil hann havi oytt teg.

49 HARRIN skal føra eina tjóð ímóti tær fjar*vegis* frá, frá endanum av jørðini, *so fljót* sum ørnin flýgur; ein tjóð, hvørs tungu tú ei skalt skilja;

50 Ein tjóð av grimmari ásjón, sum skal ei geva gætur um persón hins gamla, ella sýna góðvild móti tí unga:

51 Og hann skal eta ávøkst fenaðar tíns, og ávøkst jarðar tínar, inntil tú verði oyddur: sum

eisini skal ikki eftirlata tær *hvørki* korn, vín, ella olju, *ella* økingina av tínum kúm, ella fylgini av tínum seyði, inntil hann havi oytt teg.

52 Og hann skal kringseta teg í øllum portrum tínum, inntil tínir høgu og girdu múrar komi niður, hvará tú leitst, út gjøgnum alt títt land: og hann skal kringseta teg í øllum portrum tínum út gjøgnum alt títt land, sum HARRIN tín Guð hevur givið tær.

53 Og tú skalt eta ávøkst egna likams tíns, kjøtið á sonum tínum og døtrum tínum, sum HARRIN tín Guð hevur givið tær, í kringsetingini, og í trongsemini, hvarvið tínir fíggindar skulu níva teg:

54 *So at* tann maðurin *sum er* eymur tykkara millum, og sera viðkvæmur, hans eyga skal vera ilt ímóti bróður sínum, og ímóti vívi fangs síns, og ímóti leivdini av sínum børnum sum hann skal eftirlata:

55 So at hann vil ikki geva til nakran av teimum av kjøtinum av sínum børnum, hvørji hann skal eta: av tí at hann hevur einkið eftir *til* sín í kringsetingini, og í trongsemini, hvarvið tínir fíggindar skulu níva teg í øllum portrum tínum.

56 Hin eyma og viðkvæma kvinnan tykkara millum, sum vildi ikki dittað sær at sett ilina á sínum fóti niðurá jørðina fyri viðkvæmni og mjúksemi, hennar eyga skal vera ilt ímóti ektamanni fangs síns, og ímóti syni sínum, og ímóti dóttur síni,

57 Og ímóti hinum unga sínum, sum kemur út frá ímillum føtur hennara, og ímóti sínum børnum sum hon skal føða: tí at hon skal eta tey fyri trot á øllum *tingum* loyniligani í kringsetingini og trongsemini, hvarvið tín fíggindi skal níva teg í portrum tínum.

58 Um tú vilt ei geva gætur eftir at gera øll orðini av hesi lóg, sum eru skrivaði í hesi bók, at tú mást óttast hetta dýrdsama og óttafulla navn, HARRIN TÍN GUÐ;

59 Tá vil HARRIN gera plágur tínar undursamar, og plágurnar hjá tínum sáði, *enntá* miklar plágur, og av langari viðvaring, og svárar sjúkur, og av langari viðvaring.

60 Harafturat, hann vil føra uppá teg allar sjúkdómar Egyptalands, sum tú vart ræddur fyri; og teir skulu krøkjast at tær.

61 Eisini hvørja sjúku, og hvørja plágu, sum *er* ikki skrivað í bókini av hesi lóg, tær vil HARRIN føra uppá teg, inntil tú verði oyddur.

62 Og tit skulu verða eftir fáir í tali, hvarafturímóti tit vóru sum stjørnur himins í fjøldleika; av tí at tú vildirt ikki lýða rødd HARRANS Guðs tíns.

63 Og tað skal bera á, *at* eins og HARRIN fegnaðist yvir tykkum til at gera tykkum gott, og til at margfalda tykkum; soleiðis vil HARRIN fegnast yvir tykkum til at oyða tykkum, og til at føra tykkum til einkiðs; og tit skulu verða ryktir omanav landinum, hvagar tú fert til at ognast tað.

64 Og HARRIN skal spjaða teg millum alt fólk, frá tí ēina endanum av jørðini enntá at hīnum; og har skalt tú tæna øðrum gudum, sum hvørki tú ella fedrar tínir hava kent, *enntá* viði og steini.

65 Og millum hesar tjóðir skalt tú ongan lætta finna, eiheldur skal ilin á tínum fóti hava hvílu: men HARRIN skal geva tær har eitt bivandi hjarta, og bilan av eygum, og sorg av sinni:

66 Og títt lív skal hanga í iva frammi fyri tær; og tú skalt óttast dag og nátt, og skalt onga vissu hava um títt lív:

67 Um morgunin skalt tú siga, Gævi Guð tað var aftan! og um aftan skalt tú siga, Gævi Guð tað var morgun! fyri óttan av tínum hjarta, við hvørjum tú skalt óttast, og fyri sjónina hjá tínum eygum, sum tú skalt sjá.

68 Og HARRIN skal føra teg inn í Egyptaland aftur við skipum, eftir veginum um hvønn eg talaði við teg, Tú skalt ei meira síggja tað aftur: og har skulu tit verða seldir at tykkara figgindum sum trælmenn og trælkvinnur, og eingin maður skal keypa *tykkum*.

KAPITUL 29

HESI *eru* orð sáttmálans, sum HARRIN bjóðaði Mósesi at gera við børn Ísraels í landi Móabs, umframt sáttmálan sum hann gjørdi við teir á Hór-ëb.

2 ¶ Og Móses kallaði á allan Ísrael, og segði við teir, Tit hava sæð alt sum HARRIN gjørdi frammi fyri eygum tykkara í Egyptalandi innat Pharaoh, og innat øllum tænarum hans, og innat øllum landi hans;

3 Hinar miklu freistingar sum eygu tíni hava sæð, teknini, og hasar miklu undurgerðir:

4 Tó hevur HARRIN ikki givið tykkum eitt hjarta at varnast, og eygu at síggja, og oyru at hoyra, at hesum degi.

5 Og eg havi leitt tykkum fjøruti ár í oyðuni: tykkara klæðir eru ikki vorðin gomul uppiá tykkum, og tín skógvur er ikki vorðin gamal uppiá fóti tínum.

6 Tit hava ikki etið breyð, eiheldur hava tit drukkið vín ella sterkan drykk: at tit máttu vita, at eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

7 Og tá ið tit komu at hesum plássi, komu Sí-hŏn — kongurin av Hĕsj-bŏn, og Og — kongurin av Bá-sjän, út ímóti okkum til orrustu, og vit slógu teir:

8 Og vit tóku teirra land, og góvu tað til ein arv innat Reûbenitunum, og til Gáditarnar, og til hina hálvu ættargrein Mă-năs-sĕh.

9 Haldið tessvegna orðini av hesum sáttmála, og gerið tey, at tit mega framganga í øllum sum tit gera.

10 ¶ Tit standa henda dag allir av tykkum frammi fyri HARRANUM Guði tykkara; tykkara høvuðsmenn av ættargreinum tykkara, tykkara elstu, og tykkara yvirmenn, *við* øllum monnum Ísraels,

11 Hini smáu tykkara, konur tykkara, og tín fremmandi sum *er* í leiri tínum, frá høggaranum av viði tínum at dragaranum av vatni tínum:

12 At tú skuldirt innganga inn í sáttmála við HARRAN Guð tín, og inn í eið hans, hvønn HARRIN tín Guð ger við teg henda dag:

13 At hann má grundleggja teg í dag til eitt fólk at sær sjálvum, og *at* hann má vera tær ein Guð, eins og hann hevur sagt við teg, og sum hann hevur svorið fedrum tínum, til Ábrahams, til Ísaaks, og til Jákobs.

14 Eiheldur við tykkum einans geri eg henda sáttmála og henda eið;

15 Men við *hann* sum stendur her við okkum henda dag frammi fyri HARRANUM Guði várum, og eisini við *hann* sum *er* ikki her við okkum henda dag:

16 (Tí at tit vita hvussu vit hava dvalst í Egyptalandi; og hvussu vit komu igjøgnum tjóðirnar sum tit fóru framvið;

17 Og tit hava sæð teirra andstygdir, og teirra skurðgudar, við' og stein, silvur og gull, sum *vóru* teirra millum:)

18 At ikki tað skuldi verið tykkara millum maður, ella kvinna, ella familja, ella ættargrein, hvørs hjarta vendir burtur henda dag

frá HARRANUM Guði várum, til at fara *og* tæna gudunum hjá hesum tjóðunum; at ikki tað skuldi verið tykkara millum ein rót sum ber gall og malurt;

19 Og tað beri á, tá ið hann hoyrir orðini av hesi banning, at hann vælsigni seg sjálvan í hjarta sínum, sigandi, Eg skal hava frið, hóast eg gangi í ímyndan hjarta míns, at leggja afturat fyllskap til torsta:

20 HARRIN vil ikki spara hann, men tá skal HARRANS firtni og hans ástbrelni rúka ímóti hasum manninum, og allar banningarnar, sum eru skrivaðar í hesi bók, skulu liggja uppiá honum, og HARRIN skal sletta út hansara navn undan himni.

21 Og HARRIN skal atskilja hann at illum burtur úr øllum ættargreinum Ísraels, samsvarandi við allar banningar sáttmálans sum eru skrivaðar í hesi bók lógarinnar:

22 So at ættin *sum* koma skal av børnum tykkara sum skulu rísa upp eftir tykkum, og hin fremmandi sum skal koma frá einum fjarløgdum landi, skulu siga, tá ið tey síggja plágurnar hjá hasum landinum, og sjúkurnar sum HARRIN hevur lagt uppá tað;

23 *Og at* alt land tess *er* brennisteinur, og salt, *og* brenning, *at* tað verður ikki sáðað, ella ber *fram,* ella nakað gras grør harí, líka *sum* kollrenningin av Sodomu, og Gō-mŏr´-rūh, Ăd´-mūh, og Zē´-bō-ĭm, sum HARRIN kollrendi í síni firtni, og í síni vreiði:

24 Enntá allar tjóðir skulu siga, Hvørsvegna hevur HARRIN gjørt svá innat hesum landi? hvat *merkir* hitin av hesi miklu firtni?

25 Tá skulu menn siga, Av tí at teir hava yvirgivið sáttmála HARRANS Guðs fedra sína, sum hann gjørdi við teir, tá ið hann førdi teir fram út úr Egyptalandi:

26 Tí at teir fóru og tæntu øðrum gudum, og tilbóðu teir, gudar sum teir kendu ikki, og *sum* hann hevði ikki givið teimum:

27 Og HARRANS firtni varð kynd ímóti hesum landi, til at føra uppá tað allar tær banningar sum eru skrivaðar í hesi bók:

28 Og HARRIN tók teir upp við rót burtur úr teirra landi í firtni, og í vreiði, og í miklari harmavreiði, og kastaði teir inn í eitt annað land, eins og *tað er* henda dag.

29 Hinir loyndu *lutirnir tilhoyra* HARRANUM Guði várum: men teir *lutirnir, sum eru* opinberaðir, *tilhoyra* okkum og til barna okkara um ævir, at *vit* mega gera øll orðini av hesi lóg.

KAPITUL 30

OG tað skal bera á, tá ið øll hesi tingini eru komin uppá teg, signingin og banningin, sum eg havi sett frammi fyri tær, og tú skalt kalla *tey* til hugs millum alra teirra tjóða, hvagar HARRIN tín Guð hevur rikið teg,

2 Og skalt venda aftur at HARRANUM Guði tínum, og skalt lýða rødd hansara samsvarandi við alt sum eg ábjóði tær henda dag, tú og børn tíni, við øllum hjarta tínum, og við allari sál tíni;

3 At tá vil HARRIN tín Guð venda fangaskapi tínum, og hava várkunn uppá teg, og vil venda aftur og savna teg frá øllum teimum tjóðum, hvagar HARRIN Guð tín hevur spjatt teg.

4 Um *nakar* av tínum verði rikin út at hinum ytstu *pørtum* himins, haðani frá vil HARRIN tín Guð savna teg, og haðani frá vil hann heinta teg:

5 Og HARRIN tín Guð vil føra teg inn í landið sum tínir fedrar ognaðust, og tú skalt ognast tað;

og hann vil gera tær gott, og margfalda teg uppum tínar fedrar.
6 Og HARRIN tín Guð vil umskera hjarta títt, og hjartað hjá sáði tínum, til at elska HARRAN tín Guð við øllum hjarta tínum, og við allari sál tíni, at tú mást liva.
7 Og HARRIN tín Guð vil koyra allar hesar banningar uppá tínar figgindar, og á teir sum hata teg, sum søktu at tær.
8 Og tú skalt venda aftur og akta rødd HARRANS, og gera øll hansara boð sum eg ábjóði tær henda dag.
9 Og HARRIN tín Guð vil gera teg ríkiligan í hvørjum verki handar tínar, í ávøksti likams tíns, og í ávøksti fenaðar tíns, og í ávøksti jarðar tínar, til gott: tí at HARRIN vil aftur fegnast yvir tær til gott, eins og hann fegnaðist yvir fedrum tínum:
10 Um tú skalt lýða á rødd HARRANS Guðs tíns, til at halda hansara boðˇ og hans ásetingar, sum eru skrivað í hesi bók lógarinnar, *og* um tú vendi at HARRANUM Guði tínum við øllum hjarta tínum, og við allari sál tíni.
11 ¶ Tí at hetta boð, sum eg ábjóði tær henda dag, tað *er* ikki fjalt fyri tær, eiheldur *er* tað fjart frá.
12 Tað *er* ikki í himni, at tú skuldirt siga, Hvør skal fara upp fyri okkum til himins, og føra tað at okkum, at vit mega hoyra tað, og gera tað?
13 Eiheldur *er* tað handan havsins, at tú skuldirt siga, Hvør skal fara yvirum havið fyri okkum, og føra tað at okkum, at vit mega hoyra tað, og gera tað?
14 Men orðið *er* sera nær tær, í munni tínum, og í hjarta tínum, at tú kanst gera tað.
15 ¶ Síggj, eg havi sett frammi fyri tær henda dag lív og gott, og deyða og ilt;
16 Í at eg ábjóði tær henda dag at elska HARRAN tín Guð, at ganga í vegum hans, og at halda hansara boðˇ og hans ásetingar og hansara dómar, at tú mást liva og margfaldast: og HARRIN tín Guð skal vælsigna teg í landinum, hvagar tú fert *fyri* at ognast tað.
17 Men um títt hjarta vendi burtur, so at tú vilt ikki hoyra, men skalt verða drigin burtur, og tilbiðja aðrar gudar, og tæna teimum;
18 Eg kæri at tykkum henda dag, at tit skulu vissuliga týnast, *og at* tit skulu ikki framleingja *tykkara* dagar uppiá landinum, hvagar tú fert yvirum Jordan til at fara at ognast tað.
19 Eg kalli himin og jørð til vitnis henda dag ímóti tykkum, *at* eg havi sett frammi fyri tykkum lív og deyða, signing og banning: tessvegna vel lív, at bæði tú og títt sáð mega liva:
20 At tú mást elska HARRAN Guð tín, *og* at tú mást akta rødd hansara, og at tú mást krøkjast at honum: tí at hann *er* lív títt, og longd daga tína: at tú mást dvøljast í landinum sum HARRIN svór tínum fedrum, til Ábrahams, til Ísaaks, og til Jákobs, at geva teimum.

KAPITUL 31

OG Móses fór og talaði hesi orðini við allan Ísrael.
2 Og hann segði við teir, Eg *eri* eitt hundrað og tjúgu ára gamalur henda dag; eg kann ei meira fara út og koma inn: eisini HARRIN hevur sagt við meg, Tú skalt ikki fara yvirum hesa Jordan.
3 HARRIN tín Guð, hann vil fara yvirum undan tær, *og* hann vil oyða hesar tjóðir frammi undan tær, og tú skalt ognast tær: *og* Josjua, hann skal fara yvirum undan tær, eins og HARRIN hevur sagt.

4 Og HARRIN skal gera innat teimum eins og hann gjørdi við Sḯ-hön og við Ōg, kongar av Amoritunum, og innat landi teirra, hvørjar hann oyddi.

5 Og HARRIN skal geva teir upp frammi fyri andliti tykkara, at tit mega gera innat teimum sambært øllum boðunum sum eg havi áboðið tykkum.

6 Ver sterkur og av einum góðum treysti, óttast ikki, ella ver ræddur fyri teimum: tí at HARRIN tín Guð, hann *tað er* sum fer við tær; hann vil ikki svíkja teg, ella yvirgeva teg.

7 ¶ Og Móses kallaði á Josjua, og segði við hann í eygsjónini hjá øllum Ísrael, Ver sterkur og av einum góðum treysti: tí at tú mást fara við hesum fólki at landinum sum HARRIN hevur svorið teirra fedrum at geva teimum; og tú skalt elva teimum at arva tað.

8 Og HARRIN, hann *tað er* sum fer undan tær; hann vil vera við tær, hann vil ikki svíkja teg, eiheldur yvirgeva teg: óttast ikki, eiheldur ver mótfallin.

9 ¶ Og Móses skrivaði hesa lóg, og flýggjaði hana prestunum, sonum Levïs, sum bóru ørk sáttmála HARRANS, og innat øllum hinum elstu av Ísrael.

10 Og Móses ábjóðaði teimum, sigandi, Við endan á *hvørjum* sjey árum, í hátíðarsemi leyslatingarársins, í tabernakla-hátíðini,

11 Tá ið allur Ísrael er komin at birtast frammi fyri HARRANUM Guði tínum í tí plássi sum hann skal velja, skalt tú lesa hesa lóg frammi fyri øllum Ísrael í teirra hoyrn.

12 Savna fólkið saman, menn, og kvinnur, og børn, og tín fremmanda sum *er* innanfyri portur tíni, at tey mega hoyra, og at tey mega læra, og óttast HARRAN Guð tykkara, og gáa eftir at gera øll orðini av hesi lóg:

13 Og *at* teirra børn, sum hava ikki vitað *nakað,* mega hoyra, og læra at óttast HARRAN Guð tykkara, so leingi sum tit liva í landinum, hvagar tit fara yvirum Jordan at ognast tað.

14 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Sí, tínir dagar nærkast, at tú mást doyggja: kalla Josjua, og framsetið tykkum í samkomutabernaklinum, at eg má geva honum eina álegging. Og Móses og Josjua fóru, og framsettu seg sjálvar í samkomu-tabernaklinum.

15 Og HARRIN birtist í tabernaklinum í einum stólpa av einum skýggi: og stólpin av skýgginum stóð yvir tabernakkulsdyrnum.

16 ¶ Og HARRIN segði við Móses, Sí, tú skalt sova hjá fedrum tínum; og hetta fólkið vil rísa upp, og fara horandi eftir gudum hinna fremmandu landsins, hvagar teir fara *at vera* teirra millum, og vilja yvirgeva meg, og bróta mín sáttmála sum eg havi gjørt við teir.

17 Tá skal mín firtni verða kynd ímóti teimum á tí degi, og eg vil yvirgeva teir, og eg vil fjala mítt andlit fyri teimum, og teir skulu verða uppetnir, og mong illindir og trupulleikar skulu viðurfara teimum, so at teir vilja siga á tí degi, Eru ikki hesi illindir komin uppá okkum, av tí at Guð vár *er* ikki okkara millum?

18 Og eg vil vissuliga fjala mítt andlit á tí degi fyri øll tey illindir, sum teir skulu hava virkað, í at teir eru vendir at øðrum gudum.

19 Nú tessvegna, skrivið tit henda sang til tykkara, og frálærið hann børnum Ísraels: setið hann í teirra munnar, at hesin sangurin má vera eitt vitni hjá mær ímóti børnum Ísraels.

20 Tí at tá ið eg skal hava ført teir inn í landið sum eg svór teirra

fedrum sum flýtur við mjólk og hunangi; og teir skulu hava etið og mettað seg sjálvar, og vaksið feitir; tá vilja teir venda at øðrum gudum, og tæna teimum, og tirra meg, og bróta mín sáttmála.

21 Og tað skal bera á, tá ið mong illindir og kvalir hava viðurfarið teimum, at hesin sangurin skal vitna ímóti teimum sum eitt vitni; tí at hann skal ei verða gloymdur úr munnunum á teirra sáði: tí at eg veit teirra ímyndan, sum teir liggja úti eftir, enntá nú, áðrenn eg havi ført teir inn í landið sum eg svór.

22 ¶ Móses tessvegna skrivaði henda sang hin sama dag, og frálærdi hann Ísraels børnum.

23 Og hann gav Josjua Nuns syni eina álegging, og segði, Ver sterkur og av einum góðum treysti: tí at tú skalt føra Ísraels børn inn í landið sum eg svór teimum: og eg vil vera við tær.

24 ¶ Og tað bar á, tá ið Móses hevði lokið við at skriva orðini av hesi lóg í eina bók, inntil tey vóru fullførd,

25 At Móses ábjóðaði Levitunum, sum bóru ørk sáttmála HARRANS, sigandi,

26 Takið hesa bók lógarinnar, og setið hana í síðuna av ørk sáttmála HARRANS Guðs tykkara, at hon má vera har til eitt vitni ímóti tær.

27 Tí at eg kenni tín uppreistur, og tín harða svíra: sí, meðan eg eri enn á lívi við tykkum henda dag, hava tit verið uppreistrarsamir ímóti HARRANUM; og hvør mikið meira eftir deyða mín?

28 ¶ Savnið at mær allar hinar elstu av ættargreinum tykkara, og yvirmenn tykkara, at eg má tala hesi orð í teirra oyru, og kalla himin og jørð til vitnis ímóti teimum.

29 Tí at eg veit, at eftir mín deyða vilja tit aldeilis spilla *tykkum*, og venda til viks frá veginum sum eg havi áboðið tykkum; og ilt vil viðurfara tykkum í hinum seinnu døgum; av tí at tit vilja gera ilt í eygsjón HARRANS, til at tirra hann til firtnis gjøgnum verk handa tykkara.

30 Og Móses talaði í oyruni á allari samkomu Ísraels orðini av hesum sangi, inntil tey vóru endaði.

KAPITUL 32

LÆNIÐ oyra, O tit himnar, og eg vil tala, og hoyr, O jørð, orðini av mínum munni.

2 Mín Guðslæra skal falla sum regnið, mín tala skal drúpa sum døggin, sum tað fína regnið uppá hina bleytu urt, og sum ælini uppá grasið:

3 Av tí at eg vil kunngera navn HARRANS: tilskrivið tit Guði várum mikilleika.

4 *Hann er* Kletturin, hans verk *er* fullkomið: tí at allir hans vegir *eru* dómur: ein sannleiks Guð og uttan misgerð, rættlátur og rættur *er* hann.

5 Teir hava spilt seg sjálvar, teirra blettur *er* ikki *blettur* barna hansara: *teir eru* ein spilt og krókut ætt.

6 Endurgjalda tit HARRANUM svá, O dársama fólk og óvísa? *er* ikki hann tín faðir, *sum* hevur keypt teg? hevur hann ikki gjørt teg, og grundfest teg?

7 ¶ Minnist dagarnar í forðum, umhugsið árini hjá mongum ættarliðum: spyr faðir tín, og hann vil sýna tær; tínar elstu, og teir vilja siga tær.

8 Tá ið hin Hægsti deildi til tjóðirnar teirra arv, tá ið hann sundurdeildi synir Adams, setti hann fólkanna mørk samsvarandi við tal Ísraels barna.

9 Tí at skamtur HARRANS *er* fólk hansara; Jákob *er* lutur arvs hansara.

10 Hann fann hann í einum oyðimarkarlandi, og í tí oydnu ýlandi oyðuni; hann leiddi hann umkring, hann undirvísti honum, hann varðveitti hann sum eygnastein eyga síns.

11 Eins og ein ørn vekur upp reiður sítt, flákrar yvir ungum sínum, breiðir útum sínar veingir, tekur teir, ber teir á veingjum sínum:

12 *Soleiðis* HARRIN einsamallur leiddi hann, og *tað var* eingin fremmandur gudur við honum.

13 Hann læt hann ríða á hinum høgu plássum jarðarinnar, at hann mátti eta akranna grøði; og hann fekk hann at súgva hunang úr klettinum, og olju úr tí tinnuta klettinum;

14 Smør av kúm, og mjólk av seyði, við fiti av lombum, og veðrum av alislagi Bá´-sjăn-s, og geitir, við fitini av hveitis-nýrum; og tú drakst hitt reina vindrúvu blóð.

15 ¶ Men Jē´-sjū-rŭn varð feitur, og sparkaði: tú ert vorðin feitur, tú ert vaksin tjúkkur, tú ert dekkaður *við fiti;* tá yvirgav hann Guð *sum* gjørdi hann, og einkiðsvirdi Klett frelsu sínar.

16 Teir tirraðu hann til ástbrelnis við fremmandum *gudum,* við andstygdum teir tirraðu hann til firtnis.

17 Teir sláturofraðu djevlum, ikki til Guðs, til guda sum teir kendu ikki, til nýggja *guda sum* komu nýligani upp, hvørjar tykkara fedrar óttaðust ei.

18 Um Klettin, *sum* gat teg, ert tú óminnugur, og hevurt gloymt Guð sum myndaði teg.

19 Og tá ið HARRIN sá *tað,* stóðst honum við *teir,* vegna tirran sona sína, og døtra sína.

20 Og hann segði, Eg vil fjala mítt andlit frá teimum, eg vil sjá hvat teirra endi *skal verða:* tí at teir *eru* ein sera rangvørg ætt, børn, í hvørjum eingin trúgv *er.*

21 Teir hava rørt meg til ástbrelnis við *hasum sum er* ikki Guð; teir hava tirrað meg til firtnis við sínum fáfongdum: og eg vil røra teir til ástbrelnis við *teimum sum eru* ikki eitt fólk; eg vil tirra teir til firtnis við eini fávitskutari tjóð.

22 Tí ein eldur er kyndur í míni firtni, og skal brenna at hinum lægsta helviti, og skal upptæra jørðina við hennara grøði, og seta eld á grundvøllir fjallanna.

23 Eg vil hópa skaðar uppá teir; eg vil brúka mínar ørvar uppá teir.

24 *Teir skulu verða* brendir við hungri, og uppetnir við brennandi hita, og við beiskari oyðing: eg vil eisini senda tenninar á villdjórum uppá teir, við eitrinum av høggormum støvsins.

25 Svørðið fyri uttan, og ræðsla fyri innan, skal oyða bæði hin unga mannin og jomfrúnna, bróstabarnið *eisini* við manninum av gráum hárum.

26 Eg segði, Eg vildi spjaða teir í *út*horn˘, eg vildi fáa minnið um teir at halda uppat manna millum ífrá:

27 Var tað ikki at eg óttaðist vreiði fíggindans, at ikki teirra mótstandarar skuldu háttað sær undarliga, *og* at ikki teir skuldu siga, Hond vár *er* høg, og HARRIN hevur ikki gjørt alt hetta.

28 Tí at teir *eru* ein tjóð, tóm fyri ráð, eiheldur *er nakar* skilningur í teimum.

29 O at teir vóru vísir, *at* teir skiltu hetta, *at* teir vildu hugleiða sín seinna enda!

30 Hvussu skuldi ēin elta túsund, og tveir senda tíggju túsund á flótta, uttan teirra Klettur hevði selt teir, og HARRIN hevði byrgt teir inni?

31 Tí at teirra klettur *er* ikki sum okkara Klettur, sjálvt okkara fíggindar sjálvir *verandi* dómarar.

32 Tí at teirra víntræ *er* av víntræi Sodomu, og av akrum Gómŏr´-rŭh: teirra víndrúvur *eru* víndrúvur av galli, teirra tyssir *eru* beisk:
33 Teirra víntræ *er* eitrið av drekum, og hitt grimma eiturevni av eiturormum.
34 *Er* ikki hetta lagt niðurfyri í goymslu hjá mær, *og* innsiglað millum dýrgripa mína?
35 Til mín *hoyrir* hevnd, og endurgjald; teirra fótur skal glíða í *rættari* tíð: tí at dagurin av teirra skaðatilburði *er* fyri hond, og teir lutir, sum koma skulu uppá teir, skunda *til*.
36 Tí at HARRIN skal døma sítt fólk, og iðra seg fyri sínar tænarar, tá ið hann sær at *teirra* megi er farin, og *tað er* eingin lokaður inni, ella eftir.
37 Og hann skal siga, Hvar *eru* teirra gudar, *teirra* klettur, á hvønn teir litu,
38 Sum át feittið av teirra sláturofrum, *og* drakk vínið av teirra drykkofrum? lat teir rísa upp og hjálpa tykkum, *og* vera tykkara verja.
39 Síggið nú, at eg, *enntá* eg, *eri* hann, og *tað er* eingin gud hjá mær: eg drepi, og eg geri livandi; eg særi, og eg grøði: eiheldur *er tað nakar* sum kann útfría út úr míni hond.
40 Tí at eg lyfti upp mína hond til himins, og sigi, eg livi um ævir.
41 Um eg hvessi mítt glitrandi svørð, og mín hond taki hald á dómi; eg vil greiða hevnd til figginda mína, og vil endurgjalda teimum sum hata meg.
42 Eg vil gera mínar ørvar druknar við blóði, og mítt svørð skal gloypa kjøt; *og tað* við blóðinum av hinum vignu og fangunum, frá byrjanini av hevndum omanyvir figgindan.
43 Fegnist, O tit tjóðir, *við* fólki hans: tí at hann vil endurgjalda blóð tænara sína, og vil greiða hevnd til mótstandara sína, og vil vera miskunnarfullur at landi sínum, *og* móti fólki sínum.
44 ¶ Og Móses kom og talaði øll hesi orðini av hesum sangi í oyru fólksins, hann, og Hó-sjē´-ă Nuns sonur.
45 Og Móses gjørdi lok á at tala øll hesi orð til als Ísraels:
46 Og hann segði við teir, Setið tykkara hjørtu at øllum orðunum sum eg vitni tykkara millum henda dag, sum tit skulu ábjóða tykkara børnum at geva ans eftir at gera, øll orðini av hesi lóg.
47 Tí at tað *er* ikki eitt fáfongt ting hjá tykkum; av tí at tað *er* tykkara lív: og ígjøgnum hetta ting skulu tit framleingja *tykkara* dagar í landinum, hvagar tit fara yvirum Jordan til at *taka* tað til ognar.
48 Og HARRIN talaði við Móses sjálvan hin sama dagin, sigandi,
49 Slepp tær niðan á hetta fjallið Áb´-ă-rĭm, *at* Nē´-bō fjalli, sum *er* í landi Móabs, sum *er* yvir av Jericho; og skoða land Cānaans, sum eg gevi børnum Ísraels til eina ogn:
50 Og doyggj á fjallinum, hvagar tú fert niðan, og verð savnaður at fólki tínum; eins og Aaron tín bróðir doyði á Hór fjalli, og varð savnaður at fólki sínum:
51 Av tí at tit misbrutu ímóti mær millum Ísraels barna við vøtn Mêr´-î-bŭh-Ká´-dĕsj, í Zīns oyðu; av tí at tit halgaðu meg ikki í miðjum Ísraels børnum.
52 Tó skalt tú síggja landið frammi fyri *tær;* men tú skalt ikki fara hagar at landinum sum eg gevi Ísraels børnum.

KAPITUL 33

OG hetta *er* signingin, hvarvið Guðs maðurin Móses vælsignaði børn Ísraels áðrenn deyða sín.

2 Og hann segði, HARRIN kom frá Sĭ-naî, og reis upp frá Sē´-ĭr at teimum; hann skein fram frá Pár´-ăn fjalli, og hann kom við tíggju túsundum av heilagum: frá hans høgru hond *fór* ein eldslig lóg fyri teir.

3 Ja, hann elskaði fólkið; allir hans heilagu *eru* í tíni hond: og teir settust niður við føtur tínar; *hvør og ēin* skal móttaka av orðum tínum.

4 Móses ábjóðaði okkum eina lóg, *enntá* arvin hjá samkomu Jákobs.

5 Og hann var kongur í Jē´-sjū-rŭn, tá ið fólksins høvdˇ *og* Ísraels ættargreinir vóru savnaðir saman.

6 ¶ Lat Reûben liva, og ikki doyggja; og lat *ei* hansara menn vera fáar.

7 ¶ Og hetta *er signing* Judah: og hann segði, Hoyr, HARRI, Judah rødd, og før hann at sínum fólki: lat hansara hendur vera tilstrekkiligar hjá honum; og vert tú ein hjálp *hjá honum* frá hansara fíggindum.

8 ¶ Og um Levĭ segði hann, *Lat* tín Thûm´-mĭm og tín Ŭ´-rĭm *vera* við hinum heilaga tínum, hvønn tú royndirt við Măs´-sâh, *og við* hvønn tú stríddirst við Mêr´-ĭ-bŭh vøtn;

9 Hvør segði við faðir sín og til sína móður, Eg havi ikki sæð hann; eiheldur viðurkendi hann sínar brøður: ella kendi síni egnu børn, tí at teir hava givið ans eftir orði tínum, og hildið sáttmála tín.

10 Teir skulu frálæra Jákobi dómar tínar, og Ísrael tína lóg: teir skulu seta roykilsi framfyri teg, og heil brenni-sláturoffur uppá títt altar.

11 Vælsigna, HARRI, hansara *fíggjar*evni, og góðkenn verkið av hansara hondum: slá ígjøgnum lendarnar á teimum ið rísa ímóti honum, og á teimum sum hata hann, at teir rísi ikki aftur.

12 ¶ *Og* um Benjamin segði hann, HARRANS háttelskaði skal búgva í tryggleika hjá honum; *og HARRIN* skal dekka hann allan dagin langan, og hann skal dvøljast ímillum akslar hansara.

13 ¶ Og um Jóseph segði hann, Vælsignað av HARRANUM *veri* land hansara, fyri hinar dýrbæru lutir himins, fyri døggina, og fyri djúpið sum legast niðanfyri,

14 Og fyri hinar dýrbæru ávøkstir *førdir fram* við sólini, og fyri hinar dýrbæru lutir settir fram við mánanum,

15 Og fyri hinar fremstu lutir hinna avgomlu fjalla, og fyri hinar dýrbæru lutir hinna varandi heyggja,

16 Og fyri hinar dýrbæru lutir jarðarinnar og fylling hennara, og *fyri* góðvild hansara sum í runninum dvaldist: lat *signingina* koma uppá høvdið á Jóseph, og uppá toppin á høvdinum hjá honum *sum var* atskildur frá sínum brøðrum.

17 Hansara dýrd *er sum* frumavkom ungtarvs hansara, og hansara horn *eru sum* hornini hjá ēinhyrningum: við teimum skal hann trýsta fólkið saman til endar jarðarinnar: og teir *eru* Ē´-phrăĭm-s tíggju túsundir, og teir *eru* túsundirnar av Mă-năs´-sēh.

18 ¶ Og um Zē´-bŭ-lŏn segði hann, Fegnast, Zē´-bŭ-lŏn, í tíni útgongd; og Ĭs´-să-chăr í tínum tjøldum.

19 Teir skulu kalla fólkið til fjallsins; har skulu teir ofra sláturoffurˇ rættvísis: tí at teir skulu súgva *av* sjógvanna nøgd, og *av* dýrgripum fjaldum í sandinum.

20 ¶ Og um Gád segði hann, Vælsignaður *veri* hann sum víðkar um Gád: hann dvølist sum ein leyva, og skræðir armin við krúnu høvursins.

21 Og hann skaffaði hin fyrsta

partin til sín sjálvs, av tí at har, *í* einum skamti lóggevarans, *var hann* setstur; og hann kom við høvdum fólksins, hann útførdi rættvísi HARRANS, og hansara dómar við Ísrael.

22 ¶ Og um Dán segði hann, Dán *er* ein leyvuhvølpur: hann skal leypa frá Bá´-sjăn.

23 ¶ Og um Năph´-tâ-lī segði hann, O Năph´-tâ-lī, mettaður við yndi, og fullur av signing HARRANS: ognast tú vestrið og suðrið.

24 ¶ Og um Ásjer segði hann, *Veri* Ásjer vælsignaður við børnum; veri hann góðtokkaligur fyri sínum brøðrum, og lat hann dyppa sín fót í olju.

25 Tínir skógvar *skulu vera* jarn og messing; og sum tínir dagar *eru, soleiðis skal* styrki tín *vera*.

26 ¶ *Tað er* eingin líkur Guði Jē´-sjū-rŭn-s, *sum* ríður uppiá himninum í hjálp tíni, og í síni avbærni á luftini.

27 Hin ævigi Guð *er* skjól *titt,* og niðanfyri *eru* hinir ævigtvarandi armar: og hann skal stoyta út figgindan frammi undan tær; og skal siga, Oyð *teir*.

28 Ísrael tá skal búgva í trygd aleinaur: Jákobs kelda *skal vera* uppiá einum landi av korni og víni; eisini hans himnar skulu drúpa niður døgg.

29 Sælur *ert* tú, O Ísrael: hvør *er* líkur tær, O fólk frelst av HARRANUM, skjøldri hjálpar tínar, og hvør *er* svørð avbærni tínar! og tínir figgindar skulu finnast lygnarar yvirfyri tær; og tú skalt traðka uppá teirra høgu støð.

KAPITUL 34

OG Móses fór niðan frá slættum Móabs á fjall Nē´-bō-s, til toppin á Pĭs´-găh, sum *er* yvir av Jericho. Og HARRIN sýndi honum alt land Gileads, at Dán,

2 Og alt Năph´-tâ-lī, og land Ē´-phră-ĭm-s, og Mă-năs´-sēh, og alt land Judah, at hinum ytsta sjógvi,

3 Og suður*land*ið, og slætta Jericho dalsins, pálmatræa-staðin, at Zō´-ăr.

4 Og HARRIN segði við hann, Hetta *er* landið sum eg svór innat Ábrahami, innat Ísaaki, og innat Jákobi, sigandi, Eg vil geva tað at sáði tínum: eg havi volt tær at sjá *tað* við eygum tínum, men tú skalt ikki fara yvir hagar.

5 ¶ So Móses, tænari HARRANS, doyði har í landi Móabs, samsvarandi við orð HARRANS.

6 Og hann jarðaði hann í einum dali í landi Móabs, yvir av Bĕth-pē´-ôr: men eingin maður veit um hansara gravhýsi at hesum degi.

7 ¶ Og Móses *var* eitt hundrað og tjúgu ára gamalur, tá ið hann doyði: hans eyga var ikki kámt, ella náttúrliga kraft hansara lækkað.

8 ¶ Og Ísraels børn grótu um Móses á slættum Móabs *í* tríati dagar: so vóru dagarnir av gráting *og* harman um Móses endaðir.

9 ¶ Og Josjua Nuns sonur var fullur av vísdóms andanum; tí at Móses hevði lagt sínar hendur uppá hann: og Ísraels børn lýddu á hann, og gjørdu sum HARRIN hevði áboðið Mósesi.

10 ¶ Og tað reis ikki *upp* ein prophetur síðan í Ísrael líkur Mósesi, hvønn HARRIN kendi andlit til andlits,

11 Í øllum teknunum og undrunum, sum HARRIN sendi hann at gera í Egyptalandi við Pharaoh, og við allar tænarar hansara, og við alt land hansara,

12 Og í allari hini mektigu hond, og í allari hini miklu ræðslu, sum Móses sýndi í eygsjón als Ísraels.

JOSJUA BÓK.

KAPITUL 1

NÚ, eftir deyða Mósesar, tænara HARRANS, bar tað á, at HARRIN talaði við Josjua Nuns son, tænara Móse, sigandi,

2 Móses, tænari mín, er deyður; nú tessvegna reis *teg*, far yvirum hesa Jordan, tú, og alt hetta fólk, at landinum sum eg gevi til teirra, *enntá* til Ísraels barna.

3 Hvørt pláss sum ilin á tykkara fóti skal stíga uppá, tað havi eg givið tykkum, eins og eg segði við Móses.

4 Frá oyðuni og hesum Lī´-bănŏn enntá at hini miklu á, ánni Ĕv-phrā´-tēs, alt land Hittitanna, og at sjónum mikla ímóti niðurfaring sólarinnar, skal vera breddi tykkara.

5 Tað skal ikki nakar maður vera førur fyri at standa frammi fyri tær allar dagar lívs tíns: eins og eg var við Mósesi, *soleiðis* vil eg vera við tær: eg vil ikki svíkja teg, ella yvirgeva teg.

6 Ver sterkur og av einum góðum treysti: tí innat hesum fólki skalt tú skifta til ein arv landið, sum eg svór teirra fedrum at geva teimum.

7 Einans vert tú sterkur og sera mótsamur, at tú mást geva ans eftir at gera samsvarandi við alla lógina sum Móses, tænari mín, bjóðaði tær: vend ikki frá henni *til* hinnar høgru handar ella *til* hinnar vinstru, at tú mást framganga hvagarsumhelst tú fert.

8 Henda bók lógarinnar skal ikki víkja út úr munni tínum; men tú skalt djúphugsa harí dag og nátt, at tú mást geva ans eftir at gera samsvarandi við alt sum er skrivað harí: tí at tá skalt tú gera tín veg framgangsríkan, og tá skalt tú hava gott úrslit.

9 Havi ikki eg skipað tær? Ver sterkur og av einum góðum treysti; ver ikki ræddur, eiheldur vert tú mismótigur: tí at HARRIN tín Guð *er* við tær, hvagarsumhelst tú fert.

10 ¶ Tá skipaði Josjua yvirmonnum fólksins, sigandi,

11 Farið ígjøgnum herliðið, og skipið fólkinum, sigandi, Fyribúgvið tykkum vistir; tí innanfyri tríggjar dagar skulu tit fara yvirum hesa Jordan, til at fara inn at ognast landið, sum HARRIN Guð tykkara gevur tykkum at ognast tað.

12 ¶ Og til Reûbenitanna, og til Gáditanna, og til hálvu ættargrein Mă-năs´-sēh, talaði Josjua, sigandi,

13 Minnist orðið sum Móses, tænari HARRANS, skipaði tykkum, sigandi, HARRIN Guð tykkara hevur givið tykkum hvílu, og hevur givið tykkum hetta landið.

14 Konur tykkara, hini smáu tykkara, og fenaður tykkara, skulu verða verandi í landinum sum Móses gav tykkum hesumegin Jordan; men tit skulu fara yvirum undan brøðrum tykkara herbúnir, allir hinir mektigu reystsemis menn, og hjálpa teimum;

15 Inntil HARRIN havi givið brøðrum tykkara hvílu, eins og *hann hevur givið* tykkum, og teir eisini havi *tikið* til ognar landið sum HARRIN Guð tykkara gevur teimum: so skulu tit venda aftur at landi ognar tykkara, og njóta tað sum Móses, tænari HARRANS, gav tykkum hesumegin Jordan ímóti sólarrisinum.

16 ¶ Og teir svaraðu Josjua, sigandi, Alt, sum tú ábýðurt okkum, vilja vit gera, og hvagarsumhelst tú sendirt okkum, vilja vit fara.

17 Samsvarandi sum vit lýddu á Móses í øllum lutum, soleiðis

vilja vit lýða á teg: einans *at* HARRIN tín Guð veri við tær, eins og hann var við Mósesi.

18 Hvørsumhelst *ið hann veri seg,* sum ger uppreist ímóti ábjóðan tíni, og vil ikki lýða á tíni orð í øllum sum tú ábýðurt honum, hann skal verða tikin av lívi: einans ver sterkur og av einum góðum treysti.

KAPITUL 2

OG Josjua Nuns sonur sendi út úr Sjīt-tīm tveir menn at njósna loyniligani, sigandi, Farið *og* skoðið landið, enntá Jericho. Óg teir fóru, og komu inn í húsið hjá eini skøkju, nevnd Ráhab, og hildu til har.

2 Og tað varð sagt kongi Jericho, sigandi, Sí, tað komu menn inn higar í nátt av Ísraels børnum at kanna út landið.

3 Og kongurin av Jericho sendi til Ráhab, sigandi, Før fram menninar sum eru komnir til tín, sum eru inngingnir inn í hús títt: tí at teir veri komnir at kanna út alt landið.

4 Og kvinnan tók menninar tvá, og fjaldi teir, og segði svá, Tað komu menn at mær, men eg vitsti ikki hvaðan teir *vóru:*

5 Og tað bar á *umleið tíðina* av afturlating av portrinum, tá ið tað var myrkt, at menninir fóru út: hvagar menninir fóru, veit eg ikki: eltið eftir teimum fljótligani; tí at tit skulu innheinta teir.

6 Men hon hevði ført teir upp til takið á húsinum, og fjaldi teir við stelkunum av línurt, sum hon hevði lagt til rættis uppiá takinum.

7 Og menninir eltu eftir teimum vegin til Jordan at vaðunum: og so skjótt sum teir, sum eltu eftir teimum, vóru farnir út, lokaðu teir portrið.

8 ¶ Og áðrenn teir vóru lagstir niður, kom hon upp til teirra uppá takið;

9 Og hon segði við menninar, Eg veit, at HARRIN hevur givið tykkum landið, og at tykkara ræðsla er fallin uppá okkum, og at allir íbúgvar landsins ørmaktast uppá grund av tykkum.

10 Tí at vit hava hoyrt, hvussu HARRIN turkaði upp vatn Reyðahavsins fyri tykkum, tá ið tit komu út úr Egyptalandi; og hvat tit gjørdu innat kongunum tveimum hjá Amoritunum, sum *vóru* hīnumegin Jordan, Sī-hōn-i og Ōgi, hvørjar tit aldeilis oyddu.

11 Og so skjótt sum vit høvdu hoyrt *hesar lutir,* bráðnaðu hjørtu okkara, eiheldur varð tað verandi nakað meira mót í nøkrum manni, uppá grund av tykkum: tí at HARRIN Guð tykkara, hann *er* Guð í himni fyri oman, og á jørð fyri niðan.

12 Nú tessvegna, eg biði tykkum, svørjið at mær við HARRAN, síðan eg havi sýnt tykkum blídni, at tit vilji eisini sýna blídni at húsi faðirs míns, og geva mær eitt satt tekin:

13 Og *at* tit vilji frelsa á lívi faðir mín, og móður mína, og brøður mínar, og systrar mínar, og øll sum tey hava, og útfría vári lív frá deyða.

14 Og menninir svaraðu henni, Okkara lív fyri tykkara, um tit mæli ikki henda gerning váran. Og tað skal verða, tá ið HARRIN hevur givið okkum landið, at vit vilja fara blídliga og sannliga við tær.

15 Síðan seig hon teir niður við einum bandi ígjøgnum gluggan: tí at húsið hjá henni *var* uppiá býarmúrinum, og hon búði uppiá múrinum.

16 Og hon segði við teir, Komið tykkum til fjallsins, at ikki eltararnir møti tykkum; og krógvið tykkum har triggjar dagar, inntil eltararnir verði komnir aftur: og síðan mega tit fara tykkara veg.

17 Og menninir søgdu við hana, Vit *vilja vera* ólastandi um henda eið tín, sum tú hevurt fingið okkum *at* svørja.

18 Sí, *tá ið* vit koma inn í landið, skalt tú binda hetta skarlaks bandið í gluggan, sum tú seigst okkum niður eftir: og tú skalt føra faðir tín, og móður tína, og brøður tínar, og alt húshald faðirs tíns, heim til tín.

19 Og tað skal verða, *at* hvørsumhelst *ið* skal fara út um dyrnar á húsi tínum út á gøtuna, blóð hans *skal vera* uppiá høvdi hans, og vit *vilja vera* sakleysir: og hvørsumhelst *ið* skal vera hjá tær í húsinum, blóð hans *skal vera* á høvdi okkara, um *nøkur* hond verði uppiá honum.

20 Og um tú mæli henda gerning váran, tá vilja vit vera leysir um eið tín, sum tú hevurt fingið okkum at svørja.

21 Og hon segði, Samsvarandi orðum tykkara, soleiðis *veri* tað. Og hon sendi teir avstað, og teir fóru avstað: og hon bant skarlaks bandið í gluggan.

22 Og teir fóru, og komu at fjallinum, og vórðu har tríggjar dagar, inntil eltararnir vóru komnir aftur: og eltararnir søktu *teir* út um allan vegin, men funnu *teir* ikki.

23 ¶ So teir tveir menninir komu aftur, og stigu niður frá fjallinum, og fóru yvirum, og komu til Josjua Nuns sonar, og søgdu honum øll *ting,* sum viðurfóru teimum:

24 Og teir søgdu við Josjua, Sanniliga, HARRIN hevur flýggjað inn í hendur várar alt landið; tí at sjálvt allir íbúgvar landsins ørmaktast orsakað av okkum.

KAPITUL 3

OG Josjua reis árla um morgunin; og teir burtfluttu frá Sjït´-tïm, og komu til Jordan, hann og øll børn Ísraels, og hildu til har áðrenn teir fóru yvirum.

2 Og tað bar á aftaná tríggjar dagar, at yvirmenninir fóru ígjøgnum herliðið;

3 Og teir skipaðu fólkinum, sigandi, Tá ið tit síggja ørk sáttmála HARRANS Guðs tykkara, og prestarnar, Levitarnar, berandi hana, tá skulu tit burtflyta frá plássi tykkara, og fara aftaná henni.

4 Tó skal tað vera eitt bil ímillum tykkum og hana, umleið tvey túsund alnir eftir máti: komið ikki nær henni, at tit mega vita vegin, eftir hvørjum tit mugu fara: tí at tit hava ikki farið yvir *henda* vegin herframmanundan.

5 Og Josjua segði við fólkið, Halgið tykkum sjálvar: tí at í morgin vil HARRIN gera undur˘ tykkara millum.

6 Og Josjua talaði við prestarnar, sigandi, Takið upp ørk sáttmálans, og farið yvirum undan fólkinum. Og teir tóku upp ørk sáttmálans, og fóru undan fólkinum.

7 ¶ Og HARRIN segði við Josjua, Henda dag vil eg byrja at gera teg stóran í eygsjón als Ísraels, at teir mega vita, at eins og eg var við Mósesi, *soleiðis* vil eg vera við tær.

8 Og tú skalt skipa prestunum, sum bera ørk sáttmálans, sigandi, Tá ið tit eru komnir til bakka Jordans vatns, skulu tit standa stillir í Jordan.

9 ¶ Og Josjua segði við børn Ísraels, Komið higar, og hoyrið orðini hjá HARRANUM Guði tykkara.

10 Og Josjua segði, Hervið˘ skulu tit vita, at hin livandi Guð *er* tykkara millum, og *at* hann vil uttan svit reka út frammi undan tykkum Cânaanitarnar, og Hittitarnar, og Hï-vït´-arnar, og Pê-rïzzït´-arnar, og Gïr-gă-sjït´-arnar, og Amoritarnar, og Jëb-ŭ-sït´-arnar.

11 Sí, ørk sáttmála Harra alrar jarðarinnar fer yvirum undan tykkum inn í Jordan.
12 Nú tessvegna, takið tykkum tólv menn burtur úr ættargreinum Ísraels, burtur úr hvørji ættargrein ein mann.
13 Og tað skal bera á, so skjótt sum iljarnar á fótum prestanna, sum bera ørk HARRANS, Harra alrar jarðarinnar, skulu hvíla í vøtnum Jordans, *at* Jordans vøtn skulu verða skorin av *frá* vøtnunum sum koma oman frá í erva; og tey skulu standa uppiá eini rúgvu.
14 ¶ Og tað bar á, tá ið fólkið burtflutti frá tjøldum sínum, til at fara yvirum Jordan, og prestarnir berandi ørk sáttmálans undan fólkinum;
15 Og sum teir, ið bóru ørkina, vóru komnir at Jordan, og føturnir hjá prestunum, sum bóru ørkina, vóru dyppaðir í kantin á vatninum, (tí at Jordan yvirfloymir allar bakkar sínar alla heystartíðina,)
16 At vøtnini, sum komu oman frá í erva, stóðu *og* risu upp uppá eina rúgvu, sera langt frá staðinum Adam, sum *er* við síðuna av Zăr-ĕ-tăn: og tey, sum komu oman ímóti sjógvi slættarins, *enntá* salta havinum, svitaðust, *og* vórðu skorin av: og fólkið fór yvirum beint ímóti Jericho.
17 Og prestarnir, sum bóru ørk sáttmála HARRANS, stóðu stúttir á turrari jørð í miðjari Jordan, og allir Ísraelitarnir fóru yvirum á turrari jørð, inntil øll fólkini vóru farin reint yvirum Jordan.

KAPITUL 4

OG tað bar á, tá ið øll fólkini vóru reint farin yvirum Jordan, at HARRIN talaði við Josjua, sigandi,
2 Takið tykkum tólv menn burtur úr fólkinum, burtur úr hvørji ættargrein ein mann,
3 Og skipið tit teimum, sigandi, Takið tykkum hiðani burtur úr miðjari Jordan, burtur úr plássinum har føturnir hjá prestunum stóðu stúttir, tólv steinar, og tit skulu bera teir yvirum við tykkum, og eftirlata teir á tilhaldsstaðnum, har tit skulu halda til hesa nátt.
4 Tá kallaði Josjua teir tólv menninar sum hann hevði fyribúgvið av børnum Ísraels, burtur úr hvørjari ættargrein ein mann:
5 Og Josjua segði við teir, Farið yvirum undan ørk HARRANS Guðs tykkara inn í miðja Jordan, og takið tit upp hvør maður av tykkum ein stein uppá øksl sína, sambært talinum á ættargreinum Ísraels barna:
6 At hetta má vera eitt tekin tykkara millum, *at* tá ið tykkara børn spyrja *fedrar sínar* í komandi tíð, sigandi, Hvat *meina* tit við hesum steinunum?
7 Tá skulu tit svara teimum, At Jordans vøtn vórðu skorin av frammanfyri ørk sáttmála HARRANS; tá ið hon fór yvirum Jordan, vórðu Jordans vøtn skorin av: og hesir steinarnir skulu vera til eitt minni hjá Ísraels børnum um ævir.
8 Og Ísraels børn gjørdu so sum Josjua skipaði, og tóku upp tólv steinar burtur úr miðjari Jordan, eins og HARRIN talaði við Josjua, samsvarandi við talið á ættargreinum Ísraels barna, og bóru teir yvir við sær at staðnum, har teir hildu til, og løgdu teir niður har.
9 Og Josjua setti upp tólv steinar í miðjari Jordan, á staðnum har føturnir hjá prestunum, sum bóru sáttmálaørkina, stóðu: og har teir eru at hesum degi.
10 ¶ Tí at prestarnir, sum bóru ørkina, stóðu í miðjari Jordan, inntil alt var fullført sum HARRIN skipaði Josjua at tala við fólkið,

samsvarandi við alt sum Móses skipaði Josjua: og fólkið skundaði *sær* og fór yvirum.

11 Og tað bar á, tá ið øll fólkini vóru reint farin yvirum, at ørk HARRANS fór yvirum, og prestarnir, í nærveru fólksins.

12 Og Reûbens børn, og Gáds børn, og hálv ættargrein Mă-năs´-sĕh, fóru yvirum herbúnir undan Ísraels børnum, eins og Móses talaði við teir:

13 Um fjøruti túsund, búnir til kríggj, fóru yvirum frammi fyri HARRANUM til orrustu, til slættar Jerichos.

14 ¶ Á tí degi gjørdi HARRIN Josjua stóran í eygsjón als Ísraels; og teir óttaðust hann, eins og teir óttaðust Móses, allar dagar lívs hansara.

15 Og HARRIN talaði við Josjua, sigandi,

16 Skipa prestunum, sum bera vitnisburðar-ørkina, at teir komi upp út úr Jordan.

17 Josjua tí skipaði prestunum, sigandi, Komið tit upp út úr Jordan.

18 Og tað bar á, tá ið prestarnir, sum bóru ørk sáttmála HARRANS, vóru komnir upp út úr miðjari Jordan, *og* iljarnar á fótunum hjá prestunum vóru lyftar upp at tí turra landinum, at Jordans vøtn vendu aftur at plássi sínum, og floymdu yvir allar bakkar hennara, eins og *tey gjørdu* áður.

19 ¶ Og fólkið kom upp út úr Jordan á tí tíggjunda *deginum* av tí fyrsta mánaðinum, og leiraðist í Gĭl´-găl, á eysturbredda Jerichos.

20 Og hasar tólv steinar, sum teir tóku úr Jordan, uppsló Josjua í Gĭl´-găl.

21 Og hann talaði við Ísraels børn, sigandi, Tá ið børn tykkara skulu spyrja fedrar sínar í komandi tíð, sigandi, Hvat *merkja* hesir steinarnir?

22 Tá skulu tit lata børn tykkara vita, sigandi, Ísrael kom yvirum hesa Jordan á turrari jørð.

23 Tí at HARRIN Guð tykkara turkaði upp Jordans vøtn frammi undan tykkum, inntil tit vóru farnir yvirum, eins og HARRIN tykkara Guð gjørdi við Reyðahavið, sum hann turkaði upp frammi undan okkum, inntil vit vóru farnir yvirum:

24 At øll fólk jarðarinnar máttu kenna hond HARRANS, at hon *er* mektig: at tit máttu óttast HARRAN Guð tykkara um ævir.

KAPITUL 5

OG tað bar á, tá ið allir kongarnir hjá Amoritunum, sum *vóru* á síðuni av Jordan vestantil, og allir kongarnir hjá Cânaanitunum, sum *vóru* við sjógvin, hoyrdu, at HARRIN hevði turkað upp Jordans vøtn frammi undan Ísraels børnum, inntil vit vóru farnir yvirum, at teirra hjørtu bráðnaðu, eiheldur var andi í teimum meira, uppá grund av Ísraels børnum.

2 ¶ Á teirri tíð segði HARRIN við Josjua, Ger tær hvassar knívar, og umsker aftur Ísraels børn aðru ferðina.

3 Og Josjua gjørdi sær hvassar knívar, og umskar Ísraels børn við forhúða-heyggin.

4 Og hetta *er* grundin *fyri,* hví Josjua umskar: Alt fólkið, sum kom út úr Egyptalandi, *sum vóru* hannar, *enntá* allir krígsmenninir, doyðu í oyðuni eftir veginum, eftir *at* teir komu út úr Egyptalandi.

5 Nú, alt fólkið, sum komu út, vórðu umskornir: men alt fólkið, *sum vórðu* føddir í oyðuni eftir veginum, sum teir komu fram út úr Egyptalandi, *teir* høvdu teir ikki umskorið.

6 Tí at børn Ísraels gingu fjøruti ár í oyðuni, til alt fólkið, *sum vóru* krígsmenn, sum komu út úr Egyptalandi, vóru upptærdir, av

tí at teir lýddu ikki rødd HARRANS: hvørjum HARRIN svór, at hann vildi ikki sýna teimum landið, hvørt HARRIN svór teirra fedrum, at hann vildi geva okkum, eitt land sum flýtur við mjólk og hunangi.

7 Og teirra børn, *hvørjar* hann reisti upp í teirra stað, teir umskar Josjua: tí at teir vóru óumskornir, av tí at teir høvdu ikki umskorið teir eftir veginum.

8 Og tað bar á, tá ið teir vóru loknir *við* at umskera alt fólkið, at teir vórðu í plássum sínum í leirinum, til teir vóru heilir.

9 Og HARRIN segði við Josjua, Henda dag havi eg rullað burtur vanæru Egyptalands oman av tykkum. Hvørsvegna navnið á plássinum er kallað Gĭl′-găl at hesum degi.

10 ¶ Og børn Ísraels leiraðust í Gĭl′-găl, og hildu umleypið á tí fjúrtanda deginum av mánaðinum um aftan á slættum Jericho̲s.

11 Og teir ótu av hinum gamla korni landsins á morgindeginum eftir umleypið, ósúrgaðar køkur, og sviðið *korn* á sjálvum tí sama deginum.

12 ¶ Og măn′-nă-id helt uppat á morgindeginum eftir *at* teir høvdu etið av gamla korni landsins; eiheldur høvdu Ísraels børn măn′-nă meira; men teir ótu av ávøksti Cănaans lands tað árið.

13 ¶ Og tað bar á, tá ið Josjua var við Jericho̲, at hann lyfti upp eygum sínum og hugdi, og sí, tað stóð ein maður yvir av honum við svørði sínum drignum í hond síni: og Josjua fór at honum, og segði við hann, *Ert* tú fyri okkum, ella fyri mótstandarum okkara?

14 Og hann segði, Nei; men *sum* høvuðsmaður av herliði HARRANS eri eg nú komin. Og Josjua fell á andlit sítt til jarðarinnar, og tilbað, og segði við hann, Hvat sigur harri mín við tænara sín?

15 Og høvuðsmaðurin av herliði HARRANS segði við Josjua, Loys skógv tín uttan av fóti tínum; tí at staðið, hvará tú stendurt, *er* heilagt. Og Josjua so gjørdi.

KAPITUL 6

NÚ, Jericho̲ var trongliga lokað fyri uppá grund av Ísraels børnum: eingin fór út, og eingin kom inn.

2 Og HARRIN segði við Josjua, Síggj, eg havi givið inn í hond tína Jericho̲, og kong tess, *og* hinar mektigu reystsemis menn.

3 Og tit skulu kringfara staðin, allir *tit* krígsmenn, *og* fara rundan um staðin ĕinaferð. Svá skalt tú gera seks dagar.

4 Og sjey prestar skulu bera undan ørkini sjey lúðrar av veðrahornum: og hin sjeynda dagin skulu tit kringfara staðin sjey ferðir, og prestarnir skulu blása við lúðrunum.

5 Og tað skal bera á, at tá ið teir gera ein langan *blástur* við veðrahorninum, *og* tá ið tit hoyra ljóðið av lúðrinum, skal alt fólkið rópa við einum miklum rópi; og staðarmúrurin skal falla niður flatur, og fólkið skal uppstíga niðan, hvør maður beint framfyri seg.

6 ¶ Og Josjua Nuns sonur kallaði prestarnar, og segði við teir, Takið upp sáttmálaørkina, og latið sjey prestar bera sjey lúðrar av veðrahornum undan ørk HARRANS.

7 Og hann segði við fólkið, Farið áfram, og kringfarið staðin, og lat hann, sum er herbúgvin, fara áfram undan ørk HARRANS.

8 ¶ Og tað bar á, tá ið Josjua hevði talað við fólkið, at teir sjey prestarnir, berandi teir sjey lúðrarnar av veðrahornum, fóru áfram undan HARRANUM, og blástu við lúðrunum: og ørk sáttmála HARRANS fylgdi teimum.

9 ¶ Og teir herbúnu menninir fóru undan prestunum, sum blástu við lúðrunum, og teir aftaru komu aftaná ørkini, *prestarnir* farandi áfram, og blásandi við lúðrunum.

10 Og Josjua hevði skipað fólkinum, sigandi, Tit skulu ikki rópa, ella gera nakað ljóð við rødd tykkara, eiheldur skal *nakað* orð útganga út úr munni tykkara, inntil tann dag *sum* eg bjóði tykkum *at* rópa; tá skulu tit rópa.

11 So ørk HARRANS kringfór staðin, farandi kring *hann* ēinaferð: og teir komu inn í leirin, og hildu til í leirinum.

12 ¶ Og Josjua reis árla um morgunin, og prestarnir tóku upp ørk HARRANS.

13 Og sjey prestar, berandi sjey lúðrar av veðrahornum undan ørk HARRANS, fóru frameftir áframhaldandi, og blástu við lúðrunum: og teir herbúnu menninir fóru undan teimum; men teir aftaru komu aftaná ørk HARRANS, *prestarnir* farandi áfram, og blásandi við lúðrunum.

14 Og hin annan dagin kringfóru teir staðin ēinaferð, og vendu aftur inn í leirin: soleiðis gjørdu teir seks dagar.

15 Og tað bar á hin sjeynda dagin, at teir risu árla um lýsingina fyri deginum, og kringfóru staðin eftir hinum sama háttarlagi sjey ferðir: einans á tí deginum kringfóru teir staðin sjey ferðir.

16 Og tað bar á við hitt sjeynda skifti, tá ið prestarnir blástu við lúðrunum, segði Josjua við fólkið, Rópið; tí at HARRIN hevur givið tykkum staðin.

17 ¶ Og staðurin skal vera bannaður, *enntá* hann, og øll sum *eru* hjá, fyri HARRANUM: einans skøkjan Ráhab skal liva, hon og øll sum *eru* hjá" henni í húsinum, av tí at hon fjaldi sendiboðini sum vit sendu.

18 Og tit, í øllum føri haldið *tykkum* frá tí bannaða tinginum, at ikki tit geri *tykkum* bannaðar, tá ið tit taka av tí bannaða tinginum, og gera Ísraels leir *til* eina banning, og órógva hann.

19 Men alt silvurið, og gullið, og íløtini av messing og jarni, *eru* innvígað at HARRANUM: tey skulu koma inn í dýrgripagoymslu HARRANS.

20 So fólkið rópti, tá ið *prestarnir* blástu við lúðrunum: og tað bar á, tá ið fólkið hoyrdi ljóðið av lúðrinum, og fólkið rópti við einum miklum rópi, at múrurin fell niður flatur, so at fólkið fór niðan í staðin, hvør maður beint framfyri seg, og teir tóku staðin.

21 Og teir aldeilis oyddu alt sum *var* í staðinum, bæði mann og kvinnu, ung og gomul, og oksa, og seyð, og asna, við svørðseggini.

22 Men Josjua hevði sagt við teir tveir menninar sum høvdu njósnað út landið, Farið inn í húsið hjá skøkjuni, og førið út haðan kvinnuna, og øll sum hon hevur, eins og tit svóru henni.

23 Og teir ungu menninir sum vóru njósnarar, fóru inn, og førdu út Ráhab, og faðir hennara, og móður hennara, og bróður hennara, og alt sum hon hevði; og teir førdu út alt ættarfólk hennara, og eftirlótu tey uttanfyri leir Ísraels.

24 Og teir brendu staðin við eldi, og alt sum *var* hará: einans silvurið, og gullið, og kerini av messing og jarni, settu teir inn í dýrgripagoymsluna av HARRANS húsi.

25 Og Josjua frelsti skøkjuna Ráhab á lívi, og húshald faðirs hennara, og alt sum hon hevði; og hon býr í Ísrael *alt* at hesum degi; av tí at hon fjaldi sendiboðini sum Josjua sendi at njósna út Jericho.

26 ¶ Og Josjua eiðsvór *teir* á teirri tíð, sigandi, Bannaður *veri* tann maður fyri HARRANUM, sum reisir upp og byggir henda stað Jericho: hann skal leggja grundvøll hans í frumborna sínum, og í sínum yngsta *syni* skal hann seta upp portrini av honum.

27 So HARRIN var við Josjua; og hansara giti varð *ljóðað* út gjøgnum alt landið.

KAPITUL 7

MEN Ísraels børn framdu eitt misbrot í tí bannaða tinginum: tí Á-chăn, sonur Câr-mī-s, sonur Zăb-dī-s, sonur Zē-râh, av ættargrein Judah, tók av tí bannaða tinginum: og HARRANS firtni varð kynd ímóti børnum Ísraels.

2 Og Josjua sendi menn frá Jericho til Ā-ī, sum *er* við síðuna av Bĕth-ā-vĕn, á eystur síðuni av Beth-el, og talaði við teir, sigandi, Farið niðan og skoðið landið. Og menninir fóru niðan og skoðaðu Ā-ī.

3 Og teir komu aftur til Josjua, og søgdu við hann, Lat ikki alt fólkið fara niðan; men lat umleið tvey ella trý túsund menn fara niðan og sláa Ā-ī; *og* fá ikki alt fólkið at strevast hagar; tí at teir *eru bert* fáir.

4 So tað fóru niðan hagar av fólkinum umleið trý túsund menn: og teir flýddu undan monnunum av Ā-ī.

5 Og menninir av Ā-ī slógu av teimum umleið tríati og seks menn: tí at teir eltu teir frammanfyri portrinum *ífrá alt* at Sjĕb-ā-rīm, og slógu teir í omanfaringini: hvørsvegna hjørtuni hjá fólkinum bráðnaðu, og vórðu sum vatn.

6 ¶ Og Josjua skræddi klæðir síni, og fell til jarðarinnar uppá andlit sítt frammi fyri ørk HARRANS inntil aftanstíðina, hann og teir elstu av Ísrael, og koyrdu støv uppá síni høvur.

7 Og Josjua segði, Akk, O Harri GUÐ, hvørsvegna hevurt tú yvirhøvur ført hetta fólk yvirum Jordan, at flýggja okkum inn í hond Amoritanna, at oyða okkum? gævi Guð vit høvdu latið *okkum* lynda, og búð hīnumegin Jordan!

8 O Harri, hvat skal eg siga, tá ið Ísrael vendir sínar ryggir frammi fyri figgindum sínum!

9 Tí at Cānaanitarnir og allir íbúgvarnir av landinum skulu hoyra *harum*, og skulu umgirða okkum runt, og skera av okkara navn frá jørðini: og hvat vilt tú gera tínum mikla navni?

10 ¶ Og HARRIN segði við Josjua, Slepp tær upp; hvørsvegna liggurt tú svá uppiá andliti tínum?

11 Ísrael hevur syndað, og teir hava eisini misbrotið sáttmála mín, sum eg ábjóðaði teimum: tí at teir hava enntá tikið av tí bannaða tinginum, og hava eisini stjolið, og kávalátið eisini, og teir hava koyrt *tað* enntá millum síni egnu ting.

12 Tí kundu Ísraels børn ikki standast frammi fyri figgindum sínum, *men* vendu *sínar* ryggir frammi fyri figgindum sínum, av tí at teir vóru bannaðir: eiheldur vil eg vera við tykkum meira, uttan tit oyði hitt bannaða tykkara millum ífrá.

13 Upp, halga fólkið, og sig, Halgið tykkum ímóti í morgin: tí at svá sigur HARRIN Guð Ísraels, *Tað er* eitt bannað ting í miðjum tær, O Ísrael: tú kanst ikki standast frammi fyri figgindum tínum, inntil tit taki burtur tað bannaða tingið tykkara millum ífrá.

14 Í morgisárið, tessvegna, skulu tit verða førdir samsvarandi við ættargreinir tykkara: og tað skal verða, *at* tann ættargreinin, sum HARRIN tekur, skal koma samsvarandi við familjurnar *av henni;* og tann familjan, sum HARRIN skal

taka, skal koma eftir húskjum; og tað húski, sum HARRIN skal taka, skal koma maður eftir manni.

15 Og tað skal verða, *at* hann, sum verður tikin við tí bannaða tinginum, skal verða brendur við eldi, hann og alt sum hann hevur: av tí at hann hevur misbrotið sáttmála HARRANS, og av tí at hann hevur virkað dárskap í Ísrael.

16 ¶ So Josjua reis upp árla um morgunin, og førdi Ísrael eftir ættargreinum teirra; og ættargrein Judah varð tikin:

17 Og hann førdi familjuna av Judah; og hann tók familju Zârhīt´-anna: og hann førdi familju Zâr-hīt´-anna mann eftir mann; og Zăb´-dī varð tikin:

18 Og hann førdi húshald hansara mann eftir mann; og Á´-chăn Câr´-mī-s sonur, Zăb´-dī-s sonar, Zē´-râh sonar, av ættargrein Judah, varð tikin.

19 Og Josjua segði við Á´-chăn, Sonur mín, gev, eg biði teg, dýrd til HARRANS Guðs Ísraels, og ger játtan at honum; og sig mær nú hvat tú hevurt gjørt; fjal *tað* ikki frá mær.

20 Og Á´-chăn svaraði Josjua, og segði, Víst havi eg syndað ímóti HARRANUM Guði Ísraels, og so og so havi eg gjørt:

21 Tá ið eg sá herfonganna millum eitt glæsiligt Bábylóniskt klæði, og tvey hundrað sjē´-kl-ar av silvuri, og ein kubba av gulli á fimti sjē´-kl-a vekt, tá girnaðist eg tey, og tók tey; og sí, tey *eru* fjald í jørðini í miðjum tjaldi mínum, og silvurið undir tí.

22 ¶ So Josjua sendi sendiboð, og teir runnu at tjaldinum; og sí, *tað var* fjalt í tjaldi hansara, og silvurið undir tí.

23 Og teir tóku tey út úr miðjum tjaldinum, og førdu tey at Josjua, og at øllum børnum Ísraels, og løgdu tey út frammi fyri HARRANUM.

24 Og Josjua, og allur Ísrael við honum, tóku Á´-chăn Zē´-râh son, og silvurið, og klæðið, og kubban av gulli, og synir hansara, og døtur hansara, og oksar hansara, og asnar hansara, og seyð hansara, og tjald hansara, og alt sum hann hevði: og teir førdu tey at Á´-chôr-s dali.

25 Og Josjua segði, Hví hevurt tú órógvað okkum? HARRIN skal órógva teg henda dag. Og allur Ísrael steinaði hann við steinum, og brendi tey við eldi, eftir *at* teir høvdu steinað tey við steinum.

26 Og teir reistu yvir honum eina mikla rúgvu av steinum at hesum degi. So HARRIN vendi frá grimmsemini av síni firtni. Hvørsvegna navnið á hasum plássinum varð kallað, Á´-chôr-s dalur, at hesum degi.

KAPITUL 8

OG HARRIN segði við Josjua, Óttast ikki, eiheldur vert tú mótfallin: tak alt krígsfólkið við tær, og reis *teg*, far niðan til Ā´-ī: síggj, eg havi givið inn í hond tína kongin av Ā´-ī, og fólk hansara, og stað hansara, og land hansara:

2 Og tú skalt gera við Ā´-ī og hennara kong eins og tú gjørdirt at Jericho og kongi hennara: einans fongin harav, og fenaðin harav, skulu tit taka til ein herfong at tykkum sjálvum: legg tær eitt loynisetur til staðin aftanfyri hann.

3 ¶ So Josjua reistist, og alt krígsfólkið, til at fara niðan ímóti Ā´-ī: og Josjua valdi út tríati túsund mektigar reystsemis menn, og sendi teir avstað um nátt*ina*.

4 Og hann ábjóðaði teimum, sigandi, Sí, tit skulu liggja á lúri ímóti staðinum, *enntá* aftanfyri staðin: farið ikki sera langt frá staðinum, men verið tit allir tilreiðar:

5 Og eg, og øll fólkini sum *eru*

við mær, vilja nærkast at staðinum: og tað skal bera á, tá ið teir koma út ímóti okkum, eins og í fyrstani, at vit vilja flýggja undan teimum,
6 (Tí at teir vilja koma út aftaná okkum), til vit hava drigið teir frá staðinum; tí at teir vilja siga, Teir flýggja undan okkum, eins og í fyrstani: tí vilja vit flýggja undan teimum.
7 Tá skulu tit rísa upp frá loynisetrinum, og leggjast á staðin: tí at HARRIN Guð tykkara vil flýggja hann inn í hond tykkara.
8 Og tað skal verða, tá ið tit hava tikið staðin, *at* tit skulu seta eld á staðin: samsvarandi við ábjóðan HARRANS skulu tit gera. Síggj, eg havi boðið tykkum.
9 ¶ Josjua tessvegna sendi teir fram: og teir fóru til *tess* at liggja í loynisetri, og vórðu ímillum Beth-el og Ā′-ī, á vestur síðuni av Ā′-ī: men Josjua helt til ta náttina millum fólksins.
10 Og Josjua reis upp árla um morgunin, og upptaldi fólkið, og fór niðan, hann og teir elstu av Ísrael, undan fólkinum til Ā′-ī.
11 Og alt fólkið, *enntá* krígs*fólkið* sum *vóru* við honum, fóru niðan, og nærkaðust, og komu framfyri staðin, og slógu upp á norður síðuni av Ā′-ī: nú, *tað var* ein dalur ímillum teir og Ā′-ī.
12 Og hann tók umleið fimm túsund menn, og setti teir at liggja í loynisetri ímillum Beth-el og Ā′-ī, á vestur *síðuni* av staðinum.
13 Og tá ið teir høvdu sett fólkið, *enntá* alt herliðið sum *var* á norður *síðuni* av staðinum, og sínar liggjarar í lúri á vestur *síðuni* av staðinum, fór Josjua ta náttina inn í miðjan dalin.
14 ¶ Og tað bar á, tá ið kongurin av Ā′-ī sá *tað,* at teir skundaðu *sær* og risu upp árla, og menninir av staðinum fóru út ímóti Ísrael til bardaga, hann og alt fólk hansara, til eina ásetta tíð, framman-fyri slættan; men hann vitsti ikki, at *tað vóru* liggjarar í loynisetri ímóti honum aftanfyri staðin.
15 Og Josjua og allur Ísrael gjørdu sum um teir vóru slignir frammi fyri teimum, og flýddu eftir vegi oyðunnar.
16 Og alt fólkið, sum *vóru* í Ā′-ī, vórðu kallaðir saman at elta eftir teimum: og teir eltu eftir Josjua, og vórðu drignir burtur frá staðinum.
17 Og tað var ikki ein maður eftir í Ā′-ī ella Beth-el, sum fór ikki út eftir Ísrael: og teir eftirlótu staðin opnan, og eltu eftir Ísrael.
18 Og HARRIN segði við Josjua, Strekk út spjótið, sum *er* í hond tíni, ímóti Ā′-ī; tí at eg vil geva hann inn í hond tína. Og Josjua strekti út spjótið, sum *hann hevði* í síni hond, ímóti staðinum.
19 Og loynisetrið reisti *seg* snarliga úr sínum plássi, og teir runnu so skjótt sum hann hevði strekt út hond sína: og teir innfóru inn í staðin, og tóku hann, og skundaðu *sær* og settu eld á staðin.
20 Og tá ið menninir av Ā′-ī hugdu afturum seg, sóu teir, og sí, roykurin av staðinum steig upp til himins, og teir høvdu ongan mátt at flýggja henda veg ella handa veg: og fólkið, sum flýddi til oyðuna, vendi aftur omanyvir eltararnar.
21 Og tá ið Josjua og allur Ísrael sóu, at loynisetrið hevði tikið staðin, og at roykurin av staðinum steig upp, tá snúðu teir aftur, og slógu menninar av Ā′-ī.
22 Og hīnir útgingu út úr staðinum ímóti teimum; so teir vóru í miðjum Ísrael, summir hesumegin, og summir hasumegin: og teir slógu teir, so at teir lótu ongan av teimum vera eftir ella komast undan.
23 Og kongin av Ā′-ī tóku teir livandi, og førdu hann til Josjua.

24 Og tað bar á, tá ið Ísrael hevði lokið við at bana øllum íbúgvum Á´-ī-s í akrinum, í oyðuni í hvørji teir eltu teir, og tá ið teir vóru allir falnir á svørðseggina, inntil teir vóru uppslúkaðir, at allir Ísraelitarnir komu aftur at Á´-ī, og slógu hann við svørðseggini.

25 Og *soleiðis* varð tað, *at* øll sum fullu tann dagin, bæði av monnum og kvinnum, *vóru* tólv túsund, *enntá* allir menninir av Á´-ī.

26 Tí at Josjua dró ei sína hond tilbakar, við hvørji hann strekti út spjótið, inntil hann hevði aldeilis oytt allar íbúgvar Á´-ī-s.

27 Einans fenaðin og fongin av hasum staðinum tók Ísrael til ein herfong at sær sjálvum, samsvarandi orði HARRANS, sum hann ábeyð Josjua.

28 Og Josjua brendi Á´-ī, og gjørdi hann *til* eina rúgvu um ævir, *enntá* eina oyðing at hesum degi.

29 Og kongin av Á´-ī hongdi hann á eitt træ inntil aftanstíð: og so skjótt sum sólin var niðri, ábjóðaði Josjua at teir skuldu taka ræ hansara niður frá træinum, og kasta tað við inngongdina av staðarportrinum, og reisa hará eina mikla rúgvu av steinum, *sum er verandi* at hesum degi.

30 ¶ Tá bygdi Josjua eitt altar at HARRANUM Guði Ísraels á Ē´-bal fjalli,

31 Eins og Móses, tænari HARRANS, ábjóðaði børnum Ísraels, eins og skrivað stendur í bók lógar Móse, eitt altar av heilum steinum, yvir hvørjar eingin maður hevur lyft upp *nakað* jarn: og teir ofraðu hará brennioffurˇ at HARRANUM, og sláturofraðu friðoffurˇ.

32 ¶ Og hann skrivaði har uppá steinarnar eitt avrit av lóg Mósesar, sum hann skrivaði í nærveru Ísraels barna.

33 Og allur Ísrael, og teirra elstu, og yvirmenn, og teirra dómarar, stóðu hesumegin ørkina og hasumegin frammanfyri prestunum, Levitunum, sum bóru ørk sáttmála HARRANS, eins væl hin fremmandi, sum hann ið varð føddur teirra millum; helvtin av teimum yvir av Gē-rī´-zīm fjalli, og helvtin av teimum yvir av Ē´-bal fjalli; eins og Móses, tænari HARRANS, hevði áboðið áður, at teir skuldu vælsigna fólk Ísraels.

34 Og síðan las hann øll orð lógarinnar, signingarnar og banningarnar, samsvarandi við alt sum stendur skrivað í bók lógarinnar.

35 Tað var ikki eitt orð av øllum sum Móses bjóðaði, sum Josjua las ikki frammi fyri allari samkomu Ísraels, við kvinnunum, og hinum smáu, og hinum fremmandu sum vóru í umgangni teirra millum.

KAPITUL 9

OG tað bar á, tá ið allir kongarnir sum *vóru* hesumegin Jordan, á hólunum, og í dølunum, og á øllum strondunum av havinum mikla yvir ímóti Lī´-bā-nōn, Hittitin, Amoritin, og Cānaanitin, Pē-rīz-zīt´-in, Hī-vīt´-in, og Jēb-ū-sīt´-in, hoyrdu *harum;*

2 At teir savnaðu seg saman at berjast við Josjua og við Ísrael við ēinum samljómi.

3 ¶ Og tá ið íbúgvarnir av Gibeon hoyrdu hvat Josjua hevði gjørt at Jericho og við Á´-ī,

4 Arbeiddu teir snúðiga, og fóru og gjørdu sum um teir kundu verið umboðsmenn, og tóku gamlar sekkir uppá asnar sínar, og vínkíkar, gamlar, og skræddar, og lappaðar um;

5 Og gamlar skógvar og bøttar uppá føtur sínar, og gomul klæðir uppá seg; og alt breyðið av teirra vistum var turt *og* moðið.

6 Og teir fóru til Josjua at leirinum í Gīl´-gāl, og søgdu við hann,

og til menninar av Ísrael, Vit veri komnir frá einum fjarløgdum landi: nú tessvegna, gerið tit bandalag við okkum.

7 Og menninir av Ísrael søgdu við Hivitarnar, Vera má, *at* tit dvøljist okkara millum; og hvussu skulu vit gera eitt bandalag við tykkum?

8 Og teir søgdu við Josjua, Vit *eru* tænarar tínir. Og Josjua segði við teir, Hvørjir *eru* tit? og hvaðani frá koma tit?

9 Og teir søgdu við hann, Frá einum sera fjarløgdum landi eru tænarar tínir komnir uppá grund av navni HARRANS Guðs tíns: tí at vit hava hoyrt giti hansara, og alt sum hann gjørdi í Egyptalandi,

10 Og alt sum hann gjørdi við teir tveir kongar Amoritanna, sum *vóru* handan Jordan, við Sī´-hŏn kong av Hēsj´-bŏn, og við Óg kong av Bá´-sjăn, sum *var* í Ăsj´-tă-rōth.

11 Hvørsvegna okkara elstu og íbúgvarnir av okkara landi talaðu til okkara, sigandi, Takið vistir við tykkum til ferðina, og farið at møta teimum, og sigið við teir, Vit *eru* tænarar tykkara: tessvegna nú, gerið tit bandalag við okkum.

12 Hetta breyð okkara tóku vit heitt *til* okkara vistir úr út húsum várum á tí degi vit komu fram at fara at tykkum; men nú, sí, tað er turt, og tað er moðið:

13 Og hesir kíkarnir av víni, sum vit fyltu, *vóru* nýggir; og sí, teir veri skræddir: og hesi klæðir okkara og skógvar okkara eru vorðin gomul uppá grund av tí sera longu ferðini.

14 Og menninir tóku av teirra vistum, og spurdu ikki *um ráð* av munni HARRANS.

15 Og Josjua stiftaði frið við teir, og gjørdi bandalag við teir, at lata teir liva: og prinsarnir av samkomuni svóru at teimum.

16 ¶ Og tað bar á við endan á trimum døgum eftir at teir høvdu gjørt eitt bandalag við teir, at teir hoyrdu, at teir *vóru* grannar teirra, og *at* teir dvaldust teirra millum.

17 Og Ísraels børn ferðaðust, og komu at teirra staðum á tí triðja deginum. Nú, teirra staðir *vóru* Gibeon, og Chĕ-phī´-răh, og Bēēr´-ōth, og Kĭr´-jăth-jē´-ă-rīm.

18 Og børn Ísraels slógu teir ikki, av tí at prinsarnir av samkomuni høvdu svorið teimum við HARRAN Guð Ísraels. Og øll samkoman meylaði ímóti prinsunum.

19 Men allir prinsarnir søgdu við alla samkomuna, Vit hava svorið teimum við HARRAN Guð Ísraels: nú, tessvegna mega vit ikki nerta teir.

20 Hetta vilja vit gera við teir; vit vilja enntá lata teir liva, at ikki vreiði veri uppiá okkum, uppá grund av eiðinum sum vit svóru teimum.

21 Og prinsarnir søgdu við teir, Latið teir liva; men latið teir vera høggarar av viði og dragarar av vatni at allari samkomuni; eins og prinsarnir høvdu lovað teimum.

22 ¶ Og Josjua kallaði teir, og hann talaði við teir, sigandi, Hvørsvegna hava tit svikið okkum, sigandi, Vit *eru* sera langt frá tykkum; tá ið tit dvøljast okkara millum?

23 Nú, tí *eru* tit bannaðir, og tað skulu eingir av tykkum verða fríaðir frá at vera trælmenn, og høggarar av viði og dragarar av vatni fyri hús Guðs míns.

24 Og teir svaraðu Josjua, og søgdu, Av tí at tað varð vissuliga sagt tænarum tínum, hvussu ið HARRIN Guð tín ábjóðaði tænara sínum Mósesi at geva tykkum alt landið, og at oyða allar íbúgvar landsins frammi undan tykkum, tí vóru vit sára ræddir um okkara lív uppá grund av tykkum, og hava gjørt henda lut.

25 Og nú, sí, vit *eru* í tíni hond: sum tað tykist gott og rætt yvirfyri tær at gera at okkum, ger.

26 Og soleiðis gjørdi hann at teimum, og útfríaði teir út úr hond Ísraels barna, at teir vógu teir ikki.

27 Og Josjua gjørdi teir tann dagin *til* høggarar av viði og dragarar av vatni fyri samkomuna, og fyri altar HARRANS, alt at hesum degi, í tí plássi sum hann skuldi velja.

KAPITUL 10

NÚ, tað bar á, tá ið Ăd´-ō-nī-zē´-dĕk kongur av Jerusalem hevði hoyrt, hvussu Josjua hevði tikið Ā´-ī, og hevði aldeilis oytt tað; eins og hann hevði gjørt við Jericho og kong hennara, soleiðis hevði hann gjørt við Ā´-ī og kong hennara; og hvussu íbúgvarnir av Gibeon høvdu bundið frið við Ísrael, og vóru teirra millum;

2 At teir stórliga óttaðust, av tí at Gibeon *var* ein mikil staður, eins og ēin av teim kongligu staðunum, og av tí at hann *var* miklari enn Ā´-ī, og allir menn tess *vóru* mektigir.

3 Hvørsvegna Ăd´-ō-nī-zē´-dĕk kongur av Jerusalem sendi at Hō´-hăm-i kongi av Hē´-brŏn, og at Pī´-răm-i kongi av Jâr´-mûth, og at Já´-phī-ă kongi av Lá´-chĭsj, og at Dē´-bīr-i kongi av Ēg´-lŏn, sigandi,

4 Komið niðan at mær, og hjálpið mær, at vit mega sláa Gibeon: tí at tað hevur bundið frið við Josjua og við børn Ísraels.

5 Tí savnaðu teir fimm kongarnir hjá Amoritunum, kongurin av Jerusalem, kongurin av Hē´-brŏn, kongurin av Jâr´-mûth, kongurin av Lá´-chĭsj, og kongurin av Ēg´-lŏn, seg saman, og fóru niðan, teir og øll teirra herlið, og leiraðust frammanfyri Gibeon, og førdu kríggj ímóti tí.

6 ¶ Og menninir av Gibeon sendu at Josjua til leirin til Gĭl´-găl, sigandi, Slaka ei tína hond frá tænarum tínum; kom niðan til okkara snarliga, og frels okkum, og hjálp okkum: tí at allir kongarnir hjá Amoritunum, sum dvøljast í fjøllunum, eru savnaðir saman ímóti okkum.

7 So Josjua steig upp frá Gĭl´-găl, hann, og alt krígsfólkið við honum, og allir teir mektigu reystsemis menninir.

8 ¶ Og HARRIN segði við Josjua, Óttast teir ikki: tí at eg havi flýggjað teir inn í hond tína; tað skal ikki ein maður av teimum standast frammi fyri tær.

9 Josjua tessvegna kom at teimum brádliga, *og* fór niðan frá Gilgal alla nátt.

10 Og HARRIN avhólvaði teir frammi fyri Ísrael, og sló teir við eini miklari slátran í Gibeon, og elti teir eftir tí veginum sum fer niðan til Bĕth-hór´-ŏn, og sló teir til Ă-zē´-kăh, og at Măk-kē´-dâh.

11 Og tað bar á, sum teir flýddu frammi fyri Ísrael ífrá, *og* vóru í omanfaringini til Bĕth-hór´-ŏn, at HARRIN kastaði niður miklar steinar frá himni omanyvir teir at Ă-zē´-kăh, og teir doyðu: *teir vóru* fleiri sum doyðu við heglsteinum, enn *teir* sum børn Ísraels vógu við svørðinum.

12 ¶ Tá talaði Josjua til HARRANS á tí degi, tá ið HARRIN flýggjaði upp Amoritarnar frammi fyri børnum Ísraels, og hann segði í eygsjón Ísraels, Sól, statt tú still uppiá Gibeon; og tú, Máni, í dali Ăj´-ă-lŏn-s.

13 Og sólin stóð still, og mánin steðgaði, inntil fólkið hevði hevnt seg omanyvir fíggindar sínar. *Er* ikki hetta skrivað í bók Jăsj´-ēr-s? So sólin stóð still í miðjum himni, og skundaði *sær* ikki at fara niður umleið ein heilan dag.

14 Og tað var eingin dagur líka

sum hasin áðrenn hann ella aftaná hann, sum HARRIN lýddi á røddina hjá einum manni: tí at HARRIN bardist fyri Ísrael.

15 ¶ Og Josjua vendi aftur, og alt Ísrael við honum, at leirinum til Gīl′-găl.

16 Men hesir fimm kongarnir flýddu, og fjaldu seg í einum helli við Măk-kē′-dâh.

17 Og tað varð talt Josjua, sigandi, Teir fimm kongarnir eru funnir krógvaðir í einum helli við Măk-kē′-dâh.

18 Og Josjua segði, Rullið miklar steinar uppá hellismunnan, og setið menn hjá″ tí fyri at varða teir:

19 Og steðgið tit ikki, *men* eltið eftir figgindum tykkara, og sláið tað aftasta av teimum; loyvið teimum ikki at innfara inn í staðir teirra: tí at HARRIN Guð tykkara hevur flýggjað teir inn í hond tykkara.

20 Og tað bar á, tá ið Josjua og børn Ísraels høvdu lokið við at slátra teir við eini sera miklari slátran, til teir vóru uppslúkaðir, at restin, *sum* var eftir av teimum, fór inn í *víg*girdar staðir.

21 Og alt fólkið vendi aftur til leirin til Josjua við Măk-kē′-dâh í friði: eingin rørdi tungu sína ímóti nøkrum av børnum Ísraels.

22 Tá segði Josjua, Opnið hellismunnan, og førið út hasar fimm kongarnar at mær út úr hellinum.

23 Og teir so gjørdu, og førdu fram hasar fimm kongarnar at honum út úr hellinum, kongin av Jerusalem, kongin av Hē′-brŏn, kongin av Jâr′-mûth, kongin av Lá′-chĭsj, *og* kongin av Ēg′-lŏn.

24 Og tað bar á, tá ið teir førdu út hasar kongarnar at Josjua, at Josjua kallaði allar menninar av Ísrael, og segði við høvuðsmenninar av krígsmonnunum, sum fóru við honum, Komið nær, setið føtur tykkara uppá nakkarnar hjá hesum kongunum. Og teir komu nær, og settu sínar føtur uppá nakkarnar á teimum.

25 Og Josjua segði við teir, Óttist ikki, ella verið mismótigir, verið sterkir og av góðum treysti: tí at soleiðis skal HARRIN gera við allar tykkara fíggindar, ímóti hvørjum tit berjast.

26 Og síðan sló Josjua teir, og vó teir, og hongdi teir á fimm trø: og teir vórðu hangandi uppiá trøunum inntil kvøldið.

27 Og tað bar á við tíðina av niðurfaring sólarinnar, *at* Josjua skipaði, og teir tóku teir niður av trøunum, og kastaðu teir inn í hellið, í hvørjum teir høvdu verið fjaldir, og legði miklar steinar í hellismunnan, *sum eru verandi* inntil sjálvan henda dag.

28 ¶ Og tann dagin tók Josjua Măk-kē′-dâh, og sló tað við svørðseggini, og kong tess oyddi hann fullkomiliga, teir, og allar sálirnar sum *vóru* harí; hann læt ongan verða verandi: og hann gjørdi við kongin av Măk-kē′-dâh eins og hann gjørdi at kongi Jericho.

29 So fór Josjua yvir frá Măk-kē′-dâh, og alt Ísrael við honum, at Lĭb′-năh, og bardist ímóti Lĭb′-năh:

30 Og HARRIN flýggjaði tað eisini, og kong tess, inn í hond Ísraels; og hann sló tað við svørðseggini, og allar sálirnar sum *vóru* harí; hann læt ongan verða verandi í tí; men gjørdi at kongi tess eins og hann gjørdi at kongi Jericho.

31 ¶ Og Josjua fór yvir frá Lĭb′-năh, og alt Ísrael við honum, at Lá′-chĭsj, og leiraðist ímóti tí, og bardist ímóti tí:

32 Og HARRIN flýggjaði Lá′-chĭsj inn í hond Ísraels, sum tók tað á øðrum deginum, og sló tað við svørðseggini, og allar sálirnar sum *vóru* harí, samsvarandi við alt sum hann hevði gjørt við Lĭb′-năh.

33 ¶ Tá kom Hór´-ăm kongur av Gē´-zĕr niðan at hjálpa Lá´-chĭsj; og Josjua sló hann og fólk hansara, inntil hann hevði sær eftir ongan eftirverandi.

34 ¶ Og frá Lá´-chĭsj fór Josjua yvir at Ēg´-lŏn, og alt Ísrael við honum; og teir leiraðust ímóti tí, og bardust ímóti tí:

35 Og teir tóku tað á tí degi, og slógu tað við svørðseggini, og allar sálirnar sum *vóru* harí, oyddi hann fullkomiliga tann dagin, samsvarandi við alt sum hann hevði gjørt við Lá´-chĭsj.

36 Og Josjua fór niðan frá Ēg´-lŏn, og alt Ísrael við honum, at Hē´-brŏn; og teir bardust ímóti tí:

37 Og teir tóku tað, og slógu tað við svørðseggini, og kong tess, og allar staðir tess, og allar sálirnar sum *vóru* harí; hann læt ongan verandi eftir, samsvarandi við alt sum hann hevði gjørt við Ēg´-lŏn; men oyddi hann aldeilis, og allar sálirnar sum *vóru* harí.

38 ¶ Og Josjua vendi aftur, og alt Ísrael við honum, til Dē´-bîr; og bardist ímóti tí:

39 Og hann tók tað, og kong tess, og allar staðir tess; og teir slógu teir við svørðseggini, og aldeilis oyddu allar sálirnar sum *vóru* harí; hann læt ongan verandi eftir: eins og hann hevði gjørt við Hē´-brŏn, soleiðis gjørdi hann við Dē´-bîr, og við kong tess; eins og hann hevði gjørt eisini við Lĭb´-năh, og við kong hennara.

40 ¶ So Josjua sló alt land hólanna, og suðursins, og dalsins, og lindanna, og allar kongar teirra: hann læt ongan verandi eftir, men aldeilis oyddi alt sum andaði, eins og HARRIN Guð Ísraels ábeyð.

41 Og Josjua sló teir frá Ká´-dĕsj-băr-nē´-ŭ enntá at Gă´-ză, og alt land Gŏ´-sjĕn-s, enntá at Gibeon.

42 Og allar hesar kongar og land teirra tók Josjua um ēina tíð, av tí at HARRIN Guð Ísraels bardist fyri Ísrael.

43 Og Josjua vendi aftur, og alt Ísrael við honum, at leirinum til Gĭl´-găl.

KAPITUL 11

OG tað bar á, tá ið Jā´-bĭn kongur av Hā´-zôr hevði hoyrt *teir lutirnar,* at hann sendi til Jó´-băb-s kongs av Má´-dōn, og til kongsins av Sjĭm´-rōn, og til kongsins av Ăch´-sjăph,

2 Og til konganna sum *vóru* á norður *síðu*ni av fjøllunum, og av slættunum sunnanfyri Chĭn´-nē-rōth, og í dalinum, og í breddunum av Dōr á vestur *síðu*ni,

3 *Og til* Cānaanitans á eystur *síðu*ni og á vestur *síðu*ni, og *til* Amoritans, og Hittitans, og Pē-rīz-zīt´-an-s, og Jēb-ū-sīt´-an-s í fjøllunum, og *til* Hī-vīt´-an-s undir Hermon í landi Mĭz´-pēh.

4 Og teir fóru út, teir og øll teirra herlið við teimum, nógv fólk, enntá sum sandurin sum *er* uppiá sævarstrondini í fjøldleika, við hestum og vagnum sera mongum.

5 Og tá ið allir hesir kongarnir vóru møtstir saman, komu teir og slógu upp saman við vøtnini av Mē´-rōm, at berjast ímóti Ísrael.

6 ¶ Og HARRIN segði við Josjua, Ver ikki ræddur uppá grund av teimum: tí at í morgin, um hesa tíð, vil eg geva teir upp allar vignar frammi fyri Ísrael: tú skalt hælsinu*kvetta* teirra hestar, og brenna teirra vagnar við eldi.

7 So Josjua kom, og alt krígsfólkið við honum, ímóti teimum við vøtnini av Mē´-rōm brádligani; og teir fullu uppá teir.

8 Og HARRIN flýggjaði teir inn í hond Ísraels, hvørjir slógu teir, og eltu teir at miklu Zĭ´-dōn, og at Mĭs-rē´-phōth-má´-ĭm, og at Mĭz´-pēh dalinum eystanvert; og

teir slógu teir, inntil teir eftirlótu teimum ongan eftirverandi.

9 Og Josjua gjørdi teimum eins og HARRIN beyð honum: hann hælsinu*kvetti* teirra hestar, og brendi teirra vagnar við eldi.

10 ¶ Og Josjua á teirri tíð vendi tilbakar, og tók Hā´-zôr, og sló kong tess við svørðinum: tí at Hā´-zôr áðurfyrr var høvdið av øllum teimum kongadømunum.

11 Og teir slógu allar sálirnar sum *vóru* hari, við svørðseggini, aldeilis oyðandi *tær:* tað var eingin eftir at anda: og hann brendi Hā´-zôr við eldi.

12 Og allar staðirnar hjá teimum kongunum, og allar kongarnar av teimum, tók Josjua, og sló teir við svørðseggini, *og* hann aldeilis oyddi teir, eins og Móses, tænari HARRANS, ábeyð.

13 Men *hvat* staðunum, sum enn stóðu í styrki síni, *viðvíkur,* Ísrael brendi ongan av teimum, uttan Hā´-zôr einans; *hann* brendi Josjua.

14 Og allan fongin av hesum staðunum, og fenaðin, tóku Ísraels børn til ein herfong at sær sjálvum; men hvønn mann slógu teir við svørðseggini, inntil teir høvdu oytt teir, eiheldur eftirlótu teir nakran at anda.

15 ¶ Eins og HARRIN skipaði Mósesi, tænara sínum, soleiðis skipaði Móses Josjua, og soleiðis gjørdi Josjua; hann eftirlæt einkið ógjørt av øllum sum HARRIN skipaði Mósesi.

16 So Josjua tók alt tað landið, heyggjarnar, og alt suðurlandið, og alt land Gō´-sjĕn-s, og dalin, og slættan, og fjall Ísraels, og dalin hjá tí sama;

17 *Enntá* frá fjallinum Hā´-lăk, sum fer niðan til Sē´-īr, enntá at Bā´-ăl-gád í Lī´-bă-nŏn-s dalinum undir Hermon fjalli: og allar teirra kongar tók hann, og sló teir, og vó teir.

18 Josjua førdi kríggj í langa tíð við allar hasar kongarnar.

19 Tað var ikki ein staður, sum bant frið við børn Ísraels, uttan Hī-vīt´-arnir, íbúgvarnir av Gibeon: allar *aðrar* tóku teir í bardaga.

20 Tí at tað var av HARRANUM at herða hjørtu teirra, at teir skuldu koma ímóti Ísrael í bardaga, at hann mátti oyða teir aldeilis, *og* at teir máttu onga góðvild hava, men at hann mátti oyða teir, eins og HARRIN ábeyð Mósesi.

21 ¶ Og á teirri tíðini kom Josjua, og skar av Ánakimarnar frá fjøllunum, frá Hē´-brŏn, frá Dē´-bīr, frá Ánab, og frá øllum fjøllunum av Judah, og frá øllum fjøllunum av Ísrael: Josjua oyddi teir aldeilis við staðum teirra.

22 Tað var eingin av Ánakimunum eftir í landi Ísraels barna: einans í Gā´-ză, í Gáth, og í Ăsj´-dōd, vóru tað eftir.

23 So Josjua tók alt landið, samsvarandi við alt sum HARRIN segði við Móses; og Josjua gav tað til ein arv at Ísrael, samsvarandi við deildir teirra, eftir ættargreinum teirra. Og landið hvíldi frá kríggi.

KAPITUL 12

NÚ, hesir *eru* kongarnir av landinum, sum Ísraels børn slógu, og *tóku* til ognar teirra land hīnumegin Jordan ímóti sólarrisinum, frá ánni Arnon at Hermon fjalli, og allan slættan eystantil:

2 Sī´-hŏn kong av Amoritunum, hvør búði í Hĕsj´-bŏn, *og* ríkti frá Á´-rō-ēr, hvørt *er* uppiá bakkanum av ánni Arnon, og frá miðjari ánni, og frá hálvum Gilead, enntá at ánni Jăb´-bōk, *sum er* markið hjá Ammons børnum;

3 Og frá slættanum til Chĭn´-nĕ-rōth havið eystantil, og at sjógvi slættarins, *enntá* salta sjó-

num eystanfyri, vegin til Bēth-jēsj´-ī-mōth; og úr sunnan, undir Ăsj´-dōth-pĭs´-găh:

4 ¶ Og bredda Ōgs kongs av Bá´-sjăn, *sum var* av leivdini av risunum, sum dvaldist við Ăsj´-tă-rōth og við Ĕd´-rē-ī,

5 Og ríkti á Hermon fjalli, og í Săl´-căh, og í øllum Bá´-sjăn, at marki Gē-sjû-rīt´-anna og Má-ăch-â-thīt´-anna, og hálvum Gilead, marki Sī´-hŏn-s kongs av Hēsj´-bōn.

6 Teir slógu Móses, tænari HARRANS, og børn Ísraels: og Móses, tænari HARRANS, gav tað *til* eina ogn at Reûbenitunum, og Gáditunum, og hálvu ættargrein Mă-năs´-sēh.

7 ¶ Og hesir *eru* kongarnir av landinum, sum Josjua og børn Ísraels slógu hesumegin Jordan vestanfyri, frá Bă´-ăl-gád í Lí´-bă-nŏn-s dalinum enntá at fjallinum Hă´-lăk, sum gongur niðan til Sē´-īr; sum Josjua gav ættargreinum Ísraels *til* eina ogn samsvarandi við deildir teirra;

8 Í fjøllunum, og í dølunum, og í slættunum, og í lindunum, og í oyðuni, og í suðurlandinum; Hittitarnar, Amoritarnar, og Cānaanitarnar, Pē-rīz-zīt´-arnar, Hī-vīt´-arnar, og Jēb-ū-sīt´-arnar:

9 ¶ Kongurin av Jericho, ēin; kongurin av Ā´-ī, sum *er* við síðuna av Beth-el, ēin;

10 Kongurin av Jerusalem, ēin; kongurin av Hē´-brŏn, ēin;

11 Kongurin av Jâr´-mûth, ēin; kongurin av Lá´-chĭsj, ēin;

12 Kongurin av Ēg´-lŏn, ēin; kongurin av Gē´-zĕr, ēin;

13 Kongurin av Dē´-bîr, ēin; kongurin av Gē´-dĕr, ēin;

14 Kongurin av Hŏr´-măh, ēin; kongurin av Ár´-ăd, ēin;

15 Kongurin av Lĭb´-năh, ēin; kongurin av Adullam, ēin;

16 Kongurin av Măk-kē´-dâh, ēin; kongurin av Beth-el, ēin;

17 Kongurin av Tăp´-pū-ăh, ēin; kongurin av Hē´-phĕr, ēin;

18 Kongurin av Ā´-phĕk, ēin; kongurin av Lă-sjâr´-ōn, ēin;

19 Kongurin av Má´-dŏn, ēin; kongurin av Hā´-zōr, ēin;

20 Kongurin av Sjĭm´-rŏn-mē´-rŏn, ēin; kongurin av Āch´-sjăph, ēin;

21 Kongurin av Tā´-ă-năch, ēin; kongurin av Mē-gĭd´-dō, ēin;

22 Kongurin av Kē´-dēsj, ēin; kongurin av Jōk´-nē-ăm Carmels, ēin;

23 Kongurin av Dōr í breddanum hjá Dōr, ēin; kongurin av tjóðunum av Gĭl´-găl, ēin;

24 Kongurin av Tĭr´-zăh, ēin: allir kongarnir tríati og ēin.

KAPITUL 13

NÚ, Josjua var gamal *og* sligin í árum; og HARRIN segði við hann, Tú er gamal *og* sligin í árum, og tað er eftir enn sera nógv land at verða *tikið* til ognar.

2 Hetta *er* landið, sum enn er eftir: øll mørkini hjá Philistunum, og alt Gē-sjŭ´-rī,

3 Frá Sī´-hôr, sum *er* framman-fyri Egyptalandi, enntá at mørkunum hjá Ēk´-rŏn norðanvert, *ið* er roknað til Cānaanitans: fimm harrar av Philistunum; Gâ-zā-thīt´-arnir, og Ăsj-dô-thīt´-arnir, Ēsj-kâ-lŏn-ĭt´-arnir, Gīt-tīt´-arnir, og Ēk-rŏn-ĭt´-arnir; eisini Á-vīt´-arnir:

4 Frá suðuri, alt land Cānaanitanna, og Mē-âr´-āh, sum *er* við síðuna av Sī-dŏ´-nī-arunum, at Ā-phĕk, til mørkini hjá Amoritunum:

5 Og landið hjá Gīb-līt´-unum, og alt Lí´-bă-nŏn, ímóti sólarrisinum, frá Bă´-ăl-gád undir Hermon fjalli at innfaringini inn í Há´-măth.

6 Allar íbúgvarnar av heyggjalandinum frá Lí´-bă-nŏn at Mĭs-rē´-phōth-má´-ĭm, *og* allar Sī-dŏ´-nī-ar-

arnar, teir vil eg reka út frammi fyri Ísraels børnum ífrá: einans deil tú tað eftir luti at Ísraelitunum til ein arv, eins og eg havi skipað tær.

7 Nú tessvegna, deil hetta landið til ein arv at teimum níggju ættargreinunum, og hini hálvu ættargrein Mă-năs´-sĕh,

8 Við hvørjum Reûbenitarnir og Gáditarnir hava móttikið sín arv, hvønn Móses gav teimum, handan Jordan eystanfyri, *enntá* eins og Móses, tænari HARRANS, gav teimum;

9 Frá Á´-rō-ĕr, sum *er* uppiá bakkanum av ánni Arnon, og staðin sum *er* í miðjari ánni, og allan Mĕ´-dĕ-bă slættan at Dī´-bŏn;

10 Og allar staðirnir hjá Sī´-hŏn-i Amorita kongi, sum ríkti í Hĕsj´-bŏn, at markinum hjá Ammons børnum;

11 Og Gilead, og markið hjá Gĕ-sjû-rīt´-unum og Má-ăch-â-thīt´-unum, og alt Hermon fjall, og alt Bá´-sjăn at Săl´-căh;

12 Alt kongadømi Ōgs í Bá´-sjăn, sum ríkti í Ăsj´-tă-rōth og í Ĕd´-rē-ī, hvør varð verandi av leivdini av risunum: tí at hesar sló Móses, og kastaði teir út.

13 Hóast hetta, Ísraels børn útróku ikki Gĕ-sjû-rīt´-arnar, ella Má-ăch-â-thīt´-arnar: men Gĕ-sjû-rīt´-arnir og Má-ăch-â-thīt´-arnir dvøljast Ísraelitanna millum inntil henda dag.

14 Einans innat ættargrein Levī-s gav hann ongan arv; sláturoffur HARRANS Guðs Ísraels gjørd við eldi *eru* arvur teirra, eins og hann segði við teir.

15 ¶ Og Móses gav at ættargrein Reûbens barna *arv* samsvarandi við familjur teirra.

16 Og teirra breddi var frá Á´-rō-ĕr, sum *er* á bakkanum av ánni Arnon, og staðinum sum *er* í miðjari ánni, og allan slættan við Mĕ´-dĕ-bă;

17 Hĕsj´-bŏn, og allar hennara staðir, sum *eru* á slættanum; Dī´-bŏn, og Bá´-mōth-bā´-ăl, og Bĕth-bā´-ăl-mĕ´-ōn,

18 Og Jă-hā´-zăh, og Kĕ´-dĕ-mōth, og Mĕph´-ā-ăth,

19 Og Kĭr-jâ-thá´-ĭm, og Sĭb´-măh, og Zâr´-ĕth-sjā´-hâr á fjalli dalsins,

20 Og Bĕth-pē´-ôr, og Ăsj´-dōth-pĭs´-găh, og Bĕth-jĕsj´-ĭ-mōth,

21 Og allar staðirnar av slættanum, og alt kongadømi Sī´-hŏn-s kongs av Amoritunum, sum ríkti í Hĕsj´-bŏn, hvønn Móses sló við prinsunum av Mī´-dī-ăn, Ē´-vī, og Rē´-kĕm, og Zūr, og Hūr, og Rē´-bă, *sum vóru* hertogar av Sī´-hŏn, dvøljandi í landinum.

22 ¶ Bá´-lăăm eisini Bĕ´-ōr-s son, spásagnarmannin, vógu Ísraels børn við svørðinum millum teirra sum vórðu vignir av teimum.

23 Og mark Reûbens barna var Jordan, og markið *harav*. Hetta *var* arvur Reûbens barna eftir familjum teirra, staðirnir og bygdirnar harav.

24 Og Móses gav ættargrein Gáds *arv, enntá* Gáds børnum samsvarandi við familjur teirra.

25 Og teirra breddi var Jā´-zĕr, og allir staðir Gileads, og hálvt land Ammons barna, at Á´-rō-ĕr, sum *er* frammanfyri Răb´-băh;

26 Og frá Hĕsj´-bŏn at Rá´-măth-mīz´-pēh, og Bĕt´-ō-nĭm; og frá Mă-há´-nă-ĭm at markinum hjá Dĕ´-bîr;

27 Og í dalinum, Bĕth-ár´-ăm, og Bĕth-nĭm´-răh, og Sŭc´-cōth, og Zā´-phŏn, restin av kongadømi Sī´-hŏn-s kongs av Hĕsj´-bŏn, Jordan og mark *hennara, alt* at kanti Chĭn´-nĕ-rĕth-s havs hīnumegin Jordan eystanfyri.

28 Hetta *er* arvur Gáds barna eftir familjum teirra, staðirnir, og bygdir teirra.

29 ¶ Og Móses gav *arv* innat hálvu ættargrein Mă-năs´-sĕh: og

hetta var *ogn* hálvu ættargreinar Mă-năs´-sĕh barna eftir familjum teirra.

30 Og teirra breddi var frá Mă-há´-nă-ĭm, alt Bá´-sjăn, alt kongadømi Ōgs kongs av Bá´-sjăn, og allir býir Já´-ĭr-s, sum *eru* í Bá´-sjăn, trísinstjúgu staðir:

31 Og hálvt Gilead, og Ăsj´-tă-rōth, og Ĕd´-rē-ī, staðir av kongadømi Ōgs í Bá´-sjăn, *vóru tilhoyrandi* børnum Má´-chĭr-s Mă-năs´-sĕh sonar, *enntá* til hinnar einu helvtar Má´-chĭr-s barna eftir familjum teirra.

32 Hetta *eru landsumráðini,* sum Móses útdeildi til arvs á slættum Móabs, hīnumegin Jordan, við Jericho, eystanfyri.

33 Men at ættargrein Levīs gav Móses ikki *nakran* arv: HARRIN Guð Ísraels *var* arvur teirra, eins og hann segði við teir.

KAPITUL 14

OG hetta *eru landsumráðini,* sum Ísraels børn arvaðu í Cānaans landi, hvørji Ĕl-ē-ā´-zâr prestur, og Josjua Nuns sonur, og høvdini av fedrum ættargreina Ísraels barna, útdeildu í arv til teirra.

2 Eftir luti *var* arvur teirra, eins og HARRIN beyð við hendi Móse, til hinna níggju ættargreina, og *til* hinnar hálvu ættargreinar.

3 Tí at Móses hevði givið arvin hjá tveimum ættargreinum og eini hálvari ættargrein hīnumegin Jordan: men Levitunum gav hann ongan arv teirra millum.

4 Tí at Jóseph børn vóru tvær ættargreinir, Mă-năs´-sĕh og Ē´-phră-ĭm: tí góvu teir Levitunum ongan part í landinum, uttan staðir at búgva *í,* við teirra útjaðarum til teirra fenað og til teirra *figgjar*evni.

5 Eins og HARRIN bjóðaði Mósesi, soleiðis gjørdu børn Ísraels, og teir deildu landið.

6 ¶ Tá komu børn Judah at Josjua í Gĭl´-găl: og Caleb, sonur Jē´-phŭn-nĕh Kē-nēz-ĭt´-a, segði við hann, Tú veitst tað tingið, sum HARRIN segði við Guðs mannin Móses, viðvíkjandi mær og tær í Ká´-dĕsj-băr-nē´-ŭ.

7 Fjøruti ára gamalur *var* eg, tá ið Móses, tænari HARRANS, sendi meg frá Ká´-dĕsj-băr-nē´-ŭ at njósna út landið; og eg bar honum orð aftur, sum *tað var* í hjarta mínum.

8 Hóast hetta, brøður mínir, sum fóru niðan við mær, fingu hjartað hjá fólkinum *at* smelta: men eg heil*veg*is fylgdi HARRANUM Guði mínum.

9 Og Móses svór á tí degi, sigandi, Vissuliga, landið, hvará føtur tínir hava traðkað, skal vera arvur tín, og barna tína um ævir, av tí at tú hevurt heil*veg*is fylgt HARRANUM Guði mínum.

10 Og nú, sí, HARRIN hevur hildið meg á lívi, eins og hann segði, hesi fjøruti og fimm árini, enntá síðan HARRIN talaði hetta orðið við Móses, meðan Ísraels *børn* reikaðu *um* í oyðuni: og nú, sí, eg *eri* henda dag fýrsinstjúgu og fimm ára gamalur.

11 Sum enn *er, eri* eg *líka* sterkur henda dag sum *eg var* á tí degi sum Móses sendi meg: eins og mín styrki *var* tá, enntá soleiðis *er* styrki mín nú, til kríggj, bæði til at fara út, og til at koma inn.

12 Nú tessvegna, gev mær hetta fjallið, um hvørt HARRIN talaði á tí degi; tí at tú hoyrdirt á tí degi, hvussu Ánakimarnir *vóru* har, og *at* staðirnir *vóru* miklir *og* girdir: um so veri, *at* HARRIN *vilji vera* við mær, tá skal eg vera førur fyri at reka teir út, eins og HARRIN segði.

13 Og Josjua vælsignaði hann, og gav innat Calebi Jē´-phŭn-nĕh syni Hē´-brŏn til ein arv.

14 Hē´-brŏn tessvegna gjørdist arvur Calebs, sonar Jē´-phŭn-nĕh

Kē-nĕz-ĭt´-a, at hesum degi, av tí at hann heil*veg*is fylgdi HARRANUM Guði Ísraels.

15 Og navnið á Hē´-brŏn áður *var* Kĭr´-jăth-âr´-bă; *hvør Âr´-bă var* ein mikil maður millum Anakimarnar. Og landið hevði hvíld frá kríggi.

KAPITUL 15

HETTA tá var luturin hjá ættargrein Judah barna eftir familjum teirra; *enntá* til mark Ē´-dóm-s *var* Zīns oyða sunnanvert hin ytsti parturin av suður breddanum.

2 Og teirra suður mark var frá strond salta havsins, frá víkini sum lítur suðureftir:

3 Og tað fór út til suður síðuna til Má´-ă-lēh-ăc-răb´-bĭm, og fór frameftir til Zīn, og steig upp á suður síðuni at Ká´-dĕsj-bär-nē´-ū, og fór frameftir til Hĕz´-rŏn, og fór niðan til Ā´-dâr, og heintaði eina kringferð til Kâr´-kă-ă:

4 *Haðani frá* fór tað yvir ímóti Ăz´-mŏn, og fór út at Egyptalands ánni; og útgongdirnar av tí breddanum vóru við sjógvin: hetta skal vera tykkara suður breddi.

5 Og eystur markið *var* salta havið, *alt* at endanum av Jordan. Og *teirra* mark í norður umráðinum *var* frá sævarvíkini við hin ytsta part av Jordan:

6 Og markið fór niðan til Bĕth-hŏg´-lă, og fór frameftir við norður *endan* av Bĕth-ăr´-ă-băh; og markið fór upp til stein Bó´-hăn-s Reûbens sonar:

7 Og markið fór niðan ímóti Dē´-bîr frá Á´-chôr-s dali, og so norðureftir, horvandi ímóti Gĭl´-găl, sum *er* áðrenn niðanfaringina til Ă-dŭm´-mĭm, sum *er* á suður síðuni av ánni: og markið fór yvir ímóti vøtnunum av Ēn-sjē´-mĕsj, og útfaringarnar av tí vóru við Ēn-rō´-gĕl:

8 Og markið fór upp við dal Hĭn´-nŏm-s sonar at suður síðu Jĕb-ū-sĭt´-an-s; tað sama *er* Jerusalem: og markið fór upp til toppin av fjallinum sum *liggur* frammanfyri Hĭn´-nŏm-s dal vestanfyri, sum *er* við endan á dali risanna norðanfyri:

9 Og markið varð drigið frá toppinum av heygnum at keldu Nĕph-tō´-ăh vatns, og fór út til staðirnar av fjalli Ē´-phrōn-s; og markið varð drigið til Bā´-ă-lâh, sum *er* Kĭr´-jăth-jē´-ă-rĭm:

10 Og markið fór í bug frá Bā´-ă-lâh vestanfyri at Sē´-īr fjalli, og ferðaðist frameftir at síðuni av Jē´-ă-rĭm fjalli, sum *er* Chĕs´-ă-lŏn, á norður síðuni, og fór oman til Bĕth´-sjē´-mĕsj, og ferðaðist áfram til Tĭm´-năh:

11 Og markið fór út at síðu Êk´-rŏn-s norðanfyri: og markið varð drigið til Sjĭc´-rŏn, og ferðaðist frameftir til Bā´-ă-lâh fjalls, og fór út at Jăb´-nē̂el; og útgongdirnar av markinum vóru við sjógvin.

12 Og vestur markið *var* til hins mikla sævar, og bredda *hans*. Hetta *er* mark Judah barna runt umkring, samsvarandi við familjur teirra.

13 ¶ Og Calebi Jē´-phŭn-nêh syni gav hann ein part millum Judah barna, samsvarandi við HARRANS áboð til Josjua, *enntá* stað Âr´-bă-s, faðir Anaks, hvør *staður er* Hē´-brŏn.

14 Og Caleb rak haðani teir tríggjar synirnar hjá Anaki, Sjē´-sjâi, og Á´-hĭ-măn, og Tăl´-mâi, børn Anaks.

15 Og hann fór upp haðani til íbúgvanna av Dē´-bîr: og navnið á Dē´-bîr áður *var* Kĭr´-jăth-sē´-phĕr.

16 ¶ Og Caleb segði, Hann, ið slær Kĭr´-jăth-sē´-phĕr, og tekur hann, til hansara vil eg geva Ăch´-sŭh, dóttur mína, til ektakonu.

17 Og Ŏth´-nĭ-ĕl, sonur Kē´-năz-ar, bróðir Calebs, tók hann:

og hann gav honum Ăch´-sŭh, dóttur sína, til ektakonu.
18 Og tað bar á, sum hon kom *at honum,* at hon rørdi hann til at umbiðja av faðir sínum ein akur: og hon lætti *sær* av asna *sínum;* og Caleb segði við hana, Hvat vildirt tú?
19 Hvør svaraði, Gev mær eina signing; tí at tú hevurt givið mær eitt suður land; gev mær eisini lindir av vatni. Og hann gav henni hinar ovaru lindir, og hinar niðaru lindir.
20 Hetta *er* arvurin hjá ættargrein Judah barna, samsvarandi við familjur teirra.
21 Og hinir ytstu staðir ættargreinar Judah barna, ímóti Ē´dóm-s bredda sunnantil, vóru Kăb´-zeēl, og Ē´-dĕr, og Já´-gûr,
22 Og Kī´-năh, og Dī-mō´-năh, og Ă-dá´-dăh,
23 Og Kē´-dĕsj, og Hā´-zôr, og Ĭth´-năn,
24 Ziph, og Tē´-lĕm, og Bĕ-ā´-lōth,
25 Og Hā´-zôr, Hă-dăt´-tăh, og Kĕr´-ĭ-ōth, *og* Hĕz´-rōn, sum *er* Hā´-zôr,
26 Á´-măm, og Sjē´-mă, og Mō-lā´-dăh,
27 Og Hā´-zâr-găd´-dăh, og Hesj´-mon, og Bĕth-pā´-lĕt,
28 Og Hā´-zâr-sjū´-ăl, og Bēēr´-sjĕ-bă, og Bĭz-jōth´-jăh,
29 Bā´-ă-lâh, og Ĭ´-ĭm, og Ā´-zĕm,
30 Og Ĕl-tō´-lăd, og Chĕs´-ĭl, og Hôr´-măh,
31 Og Ziklag, og Măd-măn´-năh, og Săn-săn´-năh,
32 Og Lĕ-bā´-ōth, og Sjĭl´-hĭm, og Ā´-ĭn, og Rimmon: allir staðirnir *eru* tjúgu og níggju, við teirra bygdum:
33 *Og* í dalinum, Ēsj-tā´-ōl, og Zôr´-ĕ-ăh, og Ăsj´-năh,
34 Og Zā-nō´-ăh, og Ēn-găn´-nĭm, Tăp´-pū-ăh, og Ē´-năm,
35 Jâr´-mûth, og Adullam, Sō´-cōh, og Ă-zē´-kăh,
36 Og Sjă-rā´-ĭm, og Ăd-ĭ-thā´-ĭm, og Gĕ-dē´-răh, og Gĕ-dē-rō-thā´-ĭm; fjúrtan staðir við teirra bygdum:
37 Zē´-năn, og Hă-dăsj´-ăh, og Mĭg´-dăl-gád,
38 Og Dĭ´-lĕ-ăn, og Mĭz´-pēh, og Jōk´-thēēl,
39 Lá´-chĭsj, og Bŏz´-kăth, og Ēg´-lŏn,
40 Og Căb´-bŏn, og Lâh´-măm, og Kĭth´-lĭsj,
41 Og Gĕ-dē´-rōth, Bĕth-dā´-gŏn, og Ná´-ă-măh, og Măk-kē´-dâh; sekstan staðir við teirra bygdum:
42 Lĭb´-năh, og Ē´-thĕr, og Ăsj´-ăn,
43 Og Jĭph´-tăh, og Ăsj´-năh, og Nĕz´-ĭb,
44 Og Kē-ī´-lăh, og Ăch´-zĭb, og Mă-rē´-sjâh; níggju staðir við teirra bygdum:
45 Êk´-rōn, við hennara býum og hennara bygdum:
46 Frá Êk´-rōn enntá at sjónum, alt sum *lá* nær Ăsj´-dōd, við teirra bygdum:
47 Ăsj´-dōd við hennara býum og hennara bygdum, Gā´-zā við hennara býum og hennara bygdum, at Egyptalands ánni, og sjónum mikla, og marki *hans:*
48 ¶ Og í fjøllunum, Sjá´-mîr, og Jăt´-tîr, og Sō´-cōh,
49 Og Dăn´-năh, og Kĭr´-jăth-săn´-năh, sum *er* Dē´-bîr,
50 Og Ánab, og Ēsj´-tē-mōh, og Á´-nĭm,
51 Og Gō´-sjĕn, og Hó´-lŏn, og Gĭ´-lōh; ellivu staðir við teirra bygdum:
52 Arab, og Dū´-mâh, og Ēsj´-ĕ-ăn,
53 Og Janum, og Bĕth-tăp´-pū-ăh, og Ă-phē´-kăh,
54 Og Hŭm´-tăh, og Kĭr´-jăth-âr´-bă, sum *er* Hē´-brŏn, og Zĭ´-ôr; níggju staðir við teirra bygdum:
55 Má´-ŏn, Carmel, og Ziph, og Jût´-tăh,
56 Og Jĕz´-rēel, og Jōk´-dē-ăm, og Zā-nō´-ăh,

57 Cáin, Gī-bē´-ăh, og Tĭm´-năh; tíggju staðir við teirra bygdum:
58 Hăl´-hŭl, Bĕth´-zūr, og Gē-dôr,
59 Og Má´-ă-răth, og Bĕth-ā-nōth, og Ēl´-tē-kŏn; seks staðir við teirra bygdum:
60 Kĭr´-jăth-bā´-ăl, sum *er* Kĭr´-jăth-jē´-ă-rĭm, og Răb´-băh; tveir staðir við teirra bygdum:
61 Í oyðuni, Bĕth-ăr´-ă-băh, Mĭd´-dĭn, og Sĕ-cā´-căh,
62 Og Nĭb´-sjăn, og Salts-staðurin, og Ēn-gē´-dī; seks staðir við teirra bygdum.
63 ¶ Hvat Jĕb-ū-sīt´-unum viðvíkur, íbúgvunum av Jerusalem, Judah børn kundu ikki reka teir út: men Jĕb-ū-sīt´-arnir búgva við Judah børnum í Jerusalem at hesum degi.

KAPITUL 16

OG lutur Jóseph̲s barna fell *út* frá Jordan við Jeric̲ho, at vatni Jeric̲hos í eystri, til oyðuna sum gongur upp frá Jeric̲ho út gjøgnum Beth-el fjall,
2 Og gongur út frá Beth-el til Lûz, og fer frameftir at mørkum Âr´-ch̲ī-s til Ăt´-ă-rōth,
3 Og gongur oman vestanfyri til bredda Jăph̲´-lē-tī-s, at bredda Bĕth-hór´-ōn-s hins niðara, og til Gē´-zĕr: og útgongdirnar av tí eru við sjógvin.
4 So Jóseph̲s børn, Mă-năs´-sēh og Ē´-ph̲ră-ĭm, tóku arv sín.
5 ¶ Og markið hjá Ē´-ph̲ră-ĭm-s børnum samsvarandi við teirra familjur var *soleiðis:* enntá markið av teirra arvi á eystur síðuni var Ăt´-ă-rōth-ăd´-dâr, at Bĕth-hór´-ŏn tí ovara;
6 Og markið fór út ímóti sjónum til Mīch̲-mē´-thăh á norður síðuni; og markið fór íkring eystureftir at Tă´-a-nath-sjī´-lôh, og fór framvið tí í eysturi til Jă-nō´-hăh;
7 Og tað fór oman frá Jă-nō´-hăh til Ăt´-ă-rōth, og til Ná´-ă-răth, og kom til Jeric̲ho, og fór út við Jordan.
8 Markið fór út frá Tăp´-pū-ăh vestanfyri at ánni Kā´-năh; og tess útgongdir vóru við sjógvin. Hetta *er* arvurin hjá ættargrein Ē´-ph̲ră-ĭm-s barna eftir teirra familjum.
9 Og teir atskildu staðirnir til Ē´-ph̲ră-ĭm-s barna *vóru* millum arvs Mă-năs´-sēh-s barna, allir staðirnir við teirra bygdum.
10 Og teir róku ikki út Cânaanitarnar, sum dvaldust í Gē´-zĕr: men Cânaanitarnir dvøljast Ê-ph̲ră-ĭm-ĭt´-anna millum at hesum degi, og tæna undir ískasti.

KAPITUL 17

TAÐ var eisini ein lutur til Mă-năs´-sēh ættargrein; tí at hann *var* frumborni Jóseph̲s; *tað vil siga,* til Má´-ch̲ĭr-s, tí frumborna hjá Mă-năs´-sēh, faðir Gileads: av tí at hann var ein krígsmaður, tí hevði hann Gilead og Bá´-sjăn.
2 Tað var eisini *ein lutur* til restina av Mă-năs´-sēh børnum eftir teirra familjum; til Á-bī-ē´-zĕr-s barna, og til Hē´-lĕk-s barna, og til Às´-rĭ-ĕl-s barna, og til Sjē´-ch̲ĕm-s barna, og til Hē´-ph̲ĕr-s barna, og til Sjĕ-mī´-dă barna: hesir *vóru* kallkyns børnini hjá Mă-năs´-sēh Jóseph̲s syni eftir teirra familjum.
3 ¶ Men Zê-lōph̲´-ē-hăd, sonur Hē´-ph̲ĕr-s, sonar Gileads, sonar Má´-ch̲ĭr-s, sonar Mă-năs´-sēh, hevði ongar synir, men døtur: og hesi *eru* nøvnini hjá døtrunum, Mâh´-lăh, og Noah, Hōg´-lăh, Mĭl´-câh, og Tĭr´-zăh.
4 Og tær komu nær framfyri Ēl-ē-ā´-zâr prest, og framfyri Josjua Nuns son, og framfyri prinsarnar, sigandi, HARRIN bjóðaði Mósesi at geva okkum ein arv bróðra vára millum. Tessvegna, samsvarandi við HARRANS ábjóðan, gav hann

teimum ein arv millum brøðra faðirs teirra.

5 Og tað fullu *út* tíggju skamtir til Mă-năs´-sēh, umframt land Gileads og Bá´-sjăn-s, sum *vóru* hīnumegin Jordan;

6 Av tí at Mă-năs´-sēh døtur høvdu ein arv millum sona hansara: og restin av Mă-năs´-sēh sonum høvdu Gileads land.

7 ¶ Og breddin hjá Mă-năs´-sēh var frá Ásjer til Mīch-mē´-thăh, sum *liggur* frammanfyri Sjē´-chĕm; og markið fór frameftir á høgru hondini at íbúgvum Ēn-tăp´-pū-ăh.

8 *Nú,* Mă-năs´-sēh hevði Tăp´-pū-ăh land: men Tăp´-pū-ăh á Mă-năs´-sēh marki *hoyrdi* til Ē´-phră-ĭm-s barna;

9 Og breddin steig oman at ánni Kā´-năh, sunnanfyri ánna: hesir staðir Ē´-phră-ĭm-s *eru* Mă-năs´-sēh staða millum: Mă-năs´-sēh breddi eisini *var* á norður síðuni av ánni, og útgongdirnar av honum vóru við sjógvin:

10 Sunnanfyri *var tað* Ē´-phră-ĭm-s, og norðanfyri *var tað* Mă-năs´-sēh-s, og sjógvurin er mark hans; og teir møttust saman í Ásjer í norðuri, og í Ĭs´-să-chăr í eysturi.

11 Og Mă-năs´-sēh hevði í Ĭs´-să-chăr og í Ásjer Bĕth-sjē´-ăn og hennara býir, og Ĭb´-lē-ăm og hennara býir, og íbúgvarnar av Dōr og hennara býum, og íbúgvarnar av Endōr og hennara býum, og íbúgvarnar av Tā´-ă-năch og hennara býum, og íbúgvarnar av Mĕ-gĭd´-dō og hennara býum, *enntá* trý lands*umráðir.*

12 Tó kundu Mă-năs´-sēh børn ikki reka út *íbúgvarnar av* teimum staðunum; men Cānaanitarnir mundu búgva í tí landinum.

13 Tó bar tað á, tá ið Ísraels børn vóru vaksnir sterkir, at teir settu Cānaanitarnar til ikast; men róku teir ikki fullkomiliga út.

14 Og Jósephs børn talaðu við Josjua, sigandi, Hví hevurt tú givið mær *bert* ēin lut og ēin skamt at arva, við tað at eg *eri* eitt stórt fólk, eftirsum at HARRIN hevur vælsignað meg higartil?

15 Og Josjua svaraði teimum, Um tú *veri teg* eitt mikið fólk, *tá* far tær niðan til viðar*landsins,* og høgg niður til tín sjálvs har í landinum hjá Pē-rĭz-zĭt´-unum og hjá risunum, um Ē´-phră-ĭm fjall veri ov mjátt hjá tær.

16 Og Jósephs børn søgdu, Hólurin er ikki nokk hjá okkum: og allir Cānaanitarnir, sum búgva í landi dalsins, hava vagnar av jarni, *bæði teir* sum *eru* úr Bĕth-sjē´-ăn og býum hennara, og *teir* sum *eru* úr dali Jĕz´-rēēl-s.

17 Og Josjua talaði við Jósephs hús, *enntá* til Ē´-phră-ĭm-s og til Mă-năs´-sēh, sigandi, Tú *ert* eitt mikið fólk, og hevurt mikin mátt: tú skalt ikki hava ēin lut *einans:*

18 Men fjallið skal vera títt; tí at tað *er* ein skógur, og tú skalt høgga hann niður: og útgongdirnar av tí skulu vera tínar: tí at tú skalt reka út Cānaanitarnar, tó *at* teir havi *sær* jarn vagnar, *og* tó *at* teir *veri seg* sterkir.

KAPITUL 18

OG øll samkoman av Ísraels børnum savnaðu *seg* saman í Sjī´-lôh, og setti upp samkomutabernaklið har. Og landið var undirlagt frammi fyri teimum.

2 Og tað vóru eftirverandi millum Ísraels barna sjey ættargreinir, sum høvdu ikki enn móttikið arv sín.

3 Og Josjua segði við børn Ísraels, Hvussu leingi *eru* tit linir at fara at *taka* til ognar landið, sum HARRIN Guð fedra tykkara hevur givið tykkum?

4 Gevið út burturúr tykkum tríggjar menn fyri *hvørja* ættargrein: og eg vil senda teir, og teir

skulu reisa *seg,* og fara ígjøgnum landið, og uppskriva tað samsvarandi við arvin hjá teimum; og teir skulu koma *aftur* til mín.

5 Og teir skulu skifta tað í sjey partar: Judah skal verða í bredda teirra í suðri, og Jósephs hús skal verða í breddum teirra í norðuri.

6 Tit skulu tí uppskriva landið *í* sjey partar, og koma við *uppskrivingini* higar til mín, at eg má kasta lutir fyri tykkum her frammi fyri HARRANUM Guði várum.

7 Men Levitarnir hava ongan part tykkara millum; tí at prestadømi HARRANS *er* arvur teirra: og Gád, og Reūben, og hálv ættargrein Mă-năs´-sĕh, hava móttikið sín arv handan Jordan í eystri, sum Móses, tænari HARRANS, gav teimum.

8 ¶ Og menninir reistust, og fóru avstað: og Josjua álegði teimum, sum fóru at uppskriva landið, sigandi, Farið og gangið ígjøgnum landið, og uppskrivið tað, og komið aftur til mín, at eg má her kasta lutir fyri tykkum frammi fyri HARRANUM í Sjī´-lôh.

9 Og menninir fóru og ferðaðust ígjøgnum landið, og uppskrivaðu tað eftir staðum í sjey partar í eina bók, og komu *aftur* til Josjua til herliðið í Sjī´-lôh.

10 ¶ Og Josjua kastaði lutir fyri teir í Sjī´-lôh frammi fyri HARRANUM: og har skifti Josjua landið at børnum Ísraels samsvarandi við deildir teirra.

11 ¶ Og luturin hjá ættargrein Benjamins barna kom upp samsvarandi við teirra familjur: og breddin av teirra luti kom fram ímillum Judah børn og Jósephs børn.

12 Og breddin hjá teimum á norður síðuni var frá Jordan; og markið fór niðan til síðuna av Jericho á norður síðuni, og fór niðan ígjøgnum fjøllini vestanfyri; og útgongdirnar av tí vóru við Bĕth-ă´-vĕn-s oyðu.

13 Og markið fór yvir haðani frá ímóti Lūz, til síðuna av Lūz, sum *er* Beth-el, sunnanfyri; og markið steig upp til Ăt´-ă-rōth-ă´-dâr, nær heygginum sum *liggur* á suður síðuni av niðara Bĕth-hór´-ōn.

14 Og markið varð drigið *haðani,* og kringfór hjørnið á sjónum sunnanfyri, frá hólinum sum *liggur* frammanfyri Bĕth-hór´-ōn sunnanfyri; og útgongdirnar av tí vóru við Kīr´-jăth-bā´-ăl, sum *er* Kīr´-jăth-jē´-ă-rīm, ein staður hjá Judah børnum: hetta *var* vestur umráðið.

15 Og suður umráðið *var* frá endanum av Kīr´-jăth-jē´-ă-rīm, og markið fór út í vestri, og fór út til vatnabrunn Nĕph-tō´-ăh:

16 Og markið kom oman til endan á fjallinum sum *liggur* frammanfyri dal Hĭn´-nŏm-s sonar, *og* sum *er* í dalinum hjá risunum í norðuri, og stígur oman til Hĭn´-nŏm-s dal, til síðuna av Jĕb´-ū-sī í suðuri, og steig upp til Ēn-rō´-gĕl,

17 Og varð drigið úr norðuri, og fór fram til Ēn-sjē´-mĕsj, og fór fram ímóti Gĕ-lī´-lōth, sum *er* yvir ímóti niðanfaring Ă-dŭm´-mīm-s, og steig niður til stein Bó´-hăn-s Reūbens sonar,

18 Og fór frameftir ímóti síðuni yvir av Ăr´-ă-băh norðanfyri, og fór oman at Ăr´-ă-băh:

19 Og markið fór frameftir til síðuna av Bĕth-hōg´-lăh norðanfyri: og útfaringarnar av markinum vóru við norður vík salta havsins við suður enda Jordans: hetta *var* suður breddin.

20 Og Jordan var markið hjá honum á eystur síðuni. Hetta *var* arvurin hjá Benjamins børnum, eftir breddunum harav runt umkring, samsvarandi við teirra familjur.

21 Nú, staðirnir hjá ættargrein

Benjamins barna samsvarandi við teirra familjur vóru Jericho, og Bēth-hŏg′-lăh, og dalur Kē′-zĭz,
22 Og Bēth-ăr′-ă-băh, og Zĕm-ă-rā′-ĭm, og Beth-el,
23 Og Ā′-vĭm, og Pár′-ăh, og Ŏph′-răh,
24 Og Chē′-phâr-hă-ăm′-mō-nāĭ, og Ŏph′-nĭ, og Gā′-bă; tólv staðir við teirra bygdum:
25 Gibeon, og Rá′-măh, og Bēēr′-ōth,
26 Og Mĭz′-pēh, og Chē-phī′-răh, og Mó′-zăh,
27 Og Rē′-kĕm, og Ĭr′-pēel, og Tăr′-ă-lăh,
28 Og Zē′-lăh, Ēl′-lĕph, og Jēb′-ū-sī, sum *er* Jerusalem, Gĭb′-ē-ăth, *og* Kĭr′-jăth; fjúrtan staðir við teirra bygdum. Hetta *er* arvurin hjá Benjamins børnum samsvarandi við teirra familjur.

KAPITUL 19

OG annar luturin kom fram til Símeons, *enntá* til ættargreinar Símeons barna samsvarandi við teirra familjur: og teirra arvur var innanfyri arvin hjá Judah børnum.
2 Og teir høvdu í sínum arvi Bēēr′-sjē-bă, ella Sjē′-bă, og Mō-lā′-dăh,
3 Og Hā′-zâr-sjū′-ăl, og Bá′-lăh, og Ā′-zēm,
4 Og Ēl-tō′-lăd, og Bēth′-ūl, og Hŏr′-măh,
5 Og Ziklag, og Bēth-mâr′-că-bōth, og Hā′-zâr-sū′-săh,
6 Og Bēth-lē-bā′-ōth, og Sjă-rū′-hĕn; trettan staðir og teirra bygdir:
7 Ā′-ĭn, Rĕm′-mŏn, og Ē′-thĕr, og Ăsj′-ăn; fýra staðir og teirra bygdir:
8 Og allar bygdirnar sum *vóru* rundan um hesar staðirnar, til Bă′-ă-lăth-bēēr, Rá′-măth suðursins. Hetta *er* arvurin hjá ættargrein Símeons barna samsvarandi við teirra familjur.
9 Burtur úr lutinum hjá Judah børnum *var* arvurin hjá Símeons børnum: tí at parturin hjá Judah børnum var ov nógv hjá teimum: tí høvdu Símeons børn sín arv innanfyri arvin hjá teimum.
10 ¶ Og tann triðji luturin kom upp til Zē′-bū-lŏn-s barna samsvarandi við teirra familjur: og markið av teirra arvi var at Sâr′-īd:
11 Og teirra mark fór niðan ímóti sjónum, og Măr′-ă-lăh, og rakk til Dăb′-bă-sjĕth, og rakk til ánna, sum *er* frammanfyri Jōk′-nĕ-ăm;
12 Og vendi frá Sâr′-īd eystureftir ímóti sólarrisinum at marki Chĭs′-lōth-tā′-bôr-s, og so fer út til Dăb′-ē-răth, og fer niðan til Já′-phĭ-ă,
13 Og haðani frá fer áfram eystanfyri til Gĭt′-tăh-hē′-phĕr, til Ĭt′-tăh-kā′-zĭn, og fer út til Rĕm′-mŏn-mē-thō′-âr til Nē′-ăh;
14 Og markið kringfer tað á norður síðuni til Hăn′-nă-thŏn: og útgongdirnar av tí eru í Jĭph′-thăh-ĕl-s-dalinum:
15 Og Kăt′-tăth, og Nă-hăl′-lăl, og Sjĭm′-rŏn, og Ī′-dă-lăh, og Beth-lehem: tólv staðir við teirra bygdum.
16 Hetta *er* arvurin hjá Zē′-bū-lŏn-s børnum samsvarandi við teirra familjur, hesir staðirnir við teirra bygdum.
17 ¶ *Óg* hin fjórði luturin kom út til Ĭs′-să-chār-s, fyri Ĭs′-să-chār-s børn samsvarandi við teirra familjur.
18 Og teirra mark var ímóti Jĕz′-rēel, og Chē-sŭl′-lōth, og Sjū′-nĕm,
19 Og Hăph′-ă-rā-ĭm, og Sjĭ′-ōn, og Ă-nā′-hă-răth,
20 Og Răb′-bĭth, og Kĭsj′-ĭon, og Ábez,
21 Og Rĕm′-ĕth, og Ēn-găn′-nĭm, og Ēn-hăd′-dăh, og Bēth-păz′-zēz;

22 Og breddin røkkur til Tā´bôr, og Sjā-hă-zī´-măh, og Bĕth´-sjē´-mĕsj; og útgongdirnar av teirra marki vóru við Jordan: sekstan staðir við teirra bygdum.

23 Hetta *er* arvaluturin hjá ættargrein Ĭs´-să-chār-s barna samsvarandi við teirra familjur, staðirnir og teirra bygdir.

24 ¶ Og tann fimti luturin kom út til ættargrein Ásjers barna samsvarandi við teirra familjur.

25 Og teirra mark var Hĕl´-kăth, og Hā´-lī, og Bē´-tĕn, og Ăch´-sjăph,

26 Og Ă-lăm´-mĕ-lĕch, og Ā´-măd, og Mī´-sjĕ-ăl; og røkkur til Carmel vestanfyri, og til Sjī´-hôr-lĭb´-năth;

27 Og vendir ímóti sólarrisinum til Bĕth-dā´-gŏn, og røkkur til Zē´-bŭ-lŏn, og til Jĭph´-thăh-ĕl-s dalin ímóti norður síðuni av Bĕth-ē´-mĕk, og Nei´-ĕl, og fer út til Cā´-bûl á vinstru hondini,

28 Og Hē´-brŏn, og Rē´-hŏb, og Hăm´-mŏn, og Kā´-năh, *enntá* at mikla Zī´-dŏn;

29 Og *síðani* vendir breddin til Rá´-măh, og til hin sterka staðin Týrus; og breddin vendir til Hó´-săh; og útgongdirnar av honum eru við sjógvin frá breddanum til Ăch´-zīb:

30 Ūm´-măh eisini, og Ā´-phĕk, og Rē´-hŏb: tjúgu og tveir staðir við teirra bygdum.

31 Hetta *er* arvurin hjá ættargrein Ásjers barna samsvarandi við teirra familjur, hesir staðirnir við teirra bygdum.

32 ¶ Hin sætti luturin kom út til Năph´-tâ-lī-s barna, *enntá* fyri Năph´-tâ-lī-s børn samsvarandi við teirra familjur.

33 Og teirra breddi var frá Hē´-lĕph, frá Ăl´-lŏn til Zā-ă-năn´-nīm, og Ăd´-ă-mī, Nē´-kĕb, og Jăb´-nēel, at Lákum; og útgongdirnar av honum vóru við Jordan:

34 Og *so* vendir breddin vestureftir til Ăz´-nōth-tā´-bôr, og fer út haðani frá til Hŭk´-kŏk, og røkkur til Zē´-bŭ-lŏn á suður síðuni, og røkkur til Ásjer á vestur síðuni, og til Judah uppiá Jordan ímóti sólarrisinum.

35 Og teir *víg*girdu staðirnir *eru* Zĭd´-dĭm, Zēr, og Hăm´-măth, Rakkath, og Chĭn´-nĕ-rĕth,

36 Og Ăd´-ă-măh, og Rá´-măh, og Hā´-zôr,

37 Og Kē´-dĕsj, og Ĕd´-rĕ-ī, og Ĕn-hā´-zôr,

38 Og Ĭ´-rŏn, og Mīg´-dăl-ĕl, Hór´-ĕm, og Bĕth-á´-năth, og Bĕth´-sjē´-mĕsj; nítjan staðir við teirra bygdum.

39 Hetta *er* arvurin hjá ættargrein Năph´-tâ-lī-s barna samsvarandi við teirra familjur, staðirnir og teirra bygdir.

40 ¶ *Og* tann sjeyndi luturin kom út til ættargrein Dáns barna samsvarandi við teirra familjur.

41 Og breddin av teirra arvi var Zôr´-ăh, og Ēsj-tā´-ōl, og Ĭr-sjē´-mĕsj,

42 Og Sjā-ă-lăb´-bĭn, og Ăj´-ă-lŏn, og Jĕth´-lăh,

43 Og Ē´-lŏn, og Thĭm´-nă-thăh, og Ēk´-rŏn,

44 Og Ĕl´-tē-kēh, og Gĭb´-bē-thŏn, og Bā´-ă-lăth,

45 Og Jehud, og Bĕn´-ê-bē´-răk, og Gáth-rĭm´-mŏn,

46 Og Mê-jâr´-kŏn, og Rakkon, við breddanum frammanfyri Já´-phō.

47 Og breddin hjá Dáns børnum fór út *ov lítið* hjá teimum: tí fóru Dáns børn niðan at berjast ímóti Lē´-sjĕm, og tóku tað, og slógu tað við svørðseggini, og *tóku* tað til ognar, og dvaldust harí, og kallaðu Lē´-sjĕm, Dán, eftir navni Dáns, faðirs teirra.

48 Hetta *er* arvurin hjá ættargrein Dáns barna samsvarandi við teirra familjur, hesir staðirnir við teirra bygdum.

49 ¶ Tá íð teir høvdu lokið við at skifta landið til arvs eftir teirra

breddum, góvu Ísraels børn ein arv til Josjua Nuns sonar sín ámillum:

50 Samsvarandi við HARRANS orð góvu teir honum staðin sum hann umbað, *enntá* Tĭm´-năth-sĕ´răh á Ē´-phră-ĭm fjalli: og hann bygdi staðin, og dvaldist harí.

51 Hetta *eru* arvirnir, sum Ĕl-ē-ā´-zâr prestur, og Josjua Nuns sonur, og høvdini av fedrunum hjá ættargreinum Ísraels barna, skiftu til arvs viðˆ lut*akast*i í Sjī´-lôh frammi fyri HARRANUM, við dyrnar á samkomu-tabernaklinum. Soleiðis gjørdu teir *seg* lidnar við at skifta landið.

KAPITUL 20

HARRIN eisini talaði við Josjua, sigandi,

2 Tala til Ísraels barna, sigandi, Peikið út til tykkara griðsstaðir, hvarum eg talaði við tykkum viðˆ hendi Móse:

3 At banarin, sum drepur *nakran* persón óvarugt *og* óavvitanarligani, má flýggja hagar: og teir skulu vera tykkara skjól frá blóðshevnaranum.

4 Og tá ið hann, sum flýggjar at ēinum av teimum staðunum, skal standa við innfaringina av staðarportrinum, og skal kunngera sína søk í oyruni á teimum elstu av tí staðinum, *tá* skulu teir taka hann inn í staðin at sær, og geva honum eitt pláss, at hann má búgva teirra millum.

5 Og um hevnarin av blóði elti eftir honum, tá skulu teir ikki geva banaran upp í hond hansara; av tí at hann sló næsta sín óavvitanarliga, og hataði hann ikki áðurfyrr.

6 Og hann skal búgva í tí staðinum, inntil hann standi frammi fyri samkomuni til dóms, *og* inntil deyða høvuðsprestsins, sum skal vera í teimum døgunum: tá skal banarin venda aftur, og koma at egna staði sínum, og at egna húsi sínum, at staðinum — hvaðani frá hann flýddi.

7 ¶ Og teir útpeikaðu Kĕ´-dĕsj í Galilēu á Năph´-tâ-lī fjalli, og Sjĕ´-chĕm á Ē´-phră-ĭm fjalli, og Kĭr´-jăth-âr´-bă, sum *er* Hē´-brōn, á Judah fjalli.

8 Og hīnumegin Jordan við Jericho eystanfyri tilskrivaðu teir Bĕ´-zĕr í oyðuni uppiá slættanum burtur úr Reûbens ættargrein, og Rá´-möth í Gilead burtur úr Gáds ættargrein, og Gō´-lăn í Bá´-sjăn burtur úr Mă-năs´-sĕh ættargrein.

9 Hetta vóru staðirnir, útpeikaðir til øll Ísraels børn, og til hin fremmanda, sum útisitur teirra millum, at hvørsumhelst *ið* drepur *nakran* persón við óvarni, má flýggja hagar, og ikki doyggja viðˆ hendi hevnarans av blóði, inntil hann stóð frammi fyri samkomuni.

KAPITUL 21

TÁ komu nær høvdini av fedrunum hjá Levitunum at Ĕl-ĕ-ā´-zâr-i presti, og at Josjua Nuns syni, og at høvdunum av fedrunum hjá ættargreinum Ísraels barna;

2 Og teir talaðu við teir við Sjī´-lôh í Cānaans landi, sigandi, HARRIN beyð viðˆ hendi Móse at geva okkum staðir at dvøljast í, við útjaðarunum av teimum til okkara fenað.

3 Og Ísraels børn góvu Levitunum burtur úr arvi sínum, við ábjóðan HARRANS, hesar staðirnar og teirra útjaðarar.

4 Og luturin kom út til familjur Kō-hăth-ĭt´-anna: og børn Aarons prests, *sum vóru* av Levitunum, høvdu viðˆ lut*akast*i burtur av Judah ættargrein, og burtur av Símeons ættargrein, og burtur av Benjamins ættargrein, trettan staðir.

5 Og restin av børnum Kō′hăth-s *høvdu* viðˆ lut*akast*i burtur av familjunum av Ē′phră-ĭm-s ættargrein, og burtur av Dáns ættargrein, og burtur av hálvu Mă-năs′sĕh ættargrein, tíggju staðir.

6 Og Gĕr′sjŏn-s børn *høvdu* viðˆ lut*akast*i burtur av familjunum av Ĭs′să-chăr-s ættargrein, og burtur av Ásjers ættargrein, og burtur av Năph′tâ-lī-s ættargrein, og burtur av hálvu ættargrein Mă-năs′sĕh í Bá′sjān, trettan staðir.

7 Mĕ-râr′ī-s børn eftir teirra familjum *høvdu* burtur av Reûbens ættargrein, og burtur av Gáds ættargrein, og burtur av Zĕ′bū-lŏn-s ættargrein, tólv staðir.

8 Og Ísraels børn góvu viðˆ lut*akast*i innat Levitunum hesar staðir við teirra útjaðarum, eins og HARRIN ábjóðaði viðˆ hendi Móse.

9 ¶ Og teir góvu burtur av ættargrein Judah barna, og burtur av ættargrein Símeons barna, hesar staðir, sum eru *her* nevndir viðˆ navni,

10 Hvørjar børn Aarons, *verandi* av familjunum hjá Kō-hăthīt′unum, *hvørjir vóru* av børnum Levīs, høvdu: tí at teirra var tann fyrsti luturin.

11 Og teir góvu teimum stað Âr′bă-s, faðir Ánaks, hvør *staður er* Hē′brŏn, í heyggja*landi* Judah, við útjaðarum hansara rundan um hann.

12 Men akrarnar hjá staðinum, og bygdirnar harav, góvu teir til Calebs Jē′phŭn-nĕh sonar til ognar hans.

13 ¶ Svá góvu teir til barna Aarons prests Hē′brŏn við hennara útjaðarum, *at vera* ein griðsstaður hjá banaranum; og Lĭb′năh við hennara útjaðarum,

14 Og Jăt′tĭr við hennara útjaðarum, og Ĕsj′tĕ-mō′ă við hennara útjaðarum,

15 Og Hó′lŏn við hennara útjaðarum, og Dē′bĭr við hennara útjaðarum,

16 Og Ā′ĭn við hennara útjaðarum, og Jŭt′tăh við hennara útjaðarum, *og* Bĕth′sjē′mĕsj við hennara útjaðarum; níggju staðir burtur av teimum tveimum ættargreinunum.

17 Og burtur av Benjamins ættargrein, Gibeon við hennara útjaðarum, Gē′bă við hennara útjaðarum,

18 Án′ă-thōth við hennara útjaðarum, og Ăl′mŏn við hennara útjaðarum; fýra staðir.

19 Allir staðirnir hjá Aarons børnum, prestunum, *vóru* trettan staðir við teirra útjaðarum.

20 ¶ Og familjur Kō′hăth-s barna, Levitarnir sum vóru eftir av Kō′hăth-s børnum, enntá teir høvdu staðirnar av sínum luti burtur av Ē′phră-ĭm-s ættargrein.

21 Tí at teir góvu teimum Sjē′chĕm við hennara útjaðarum á Ē′phră-ĭm fjalli, *at vera* ein griðsstað hjá banaranum; og Gē′zĕr við hennara útjaðarum,

22 Og Kĭb′zā-ĭm við hennara útjaðarum, og Bĕth-hór′ŏn við hennara útjaðarum; fýra staðir.

23 Og burtur av Dáns ættargrein, Ēl′tē-kĕh við hennara útjaðarum, Gĭb′bĕ-thŏn við hennara útjaðarum,

24 Aĭ′jă-lŏn við hennara útjaðarum, Gáth-rĭm′mŏn við hennara útjaðarum, fýra staðir.

25 Og burtur av hálvu ættargrein Mă-năs′sĕh, Tā′năch við hennara útjaðarum, og Gáth-rĭm′mŏn við hennara útjaðarum; tveir staðir.

26 Allir staðirnir *vóru* tíggju við teirra útjaðarum til familjurnar av Kō′hăth-s børnum, sum vóru eftir.

27 ¶ Og Gĕr′sjŏn-s børnum, av familjunum hjá Levitunum, burtur av *hīnari* hálvu ættargrein-

ini av Mă-năs´-sĕh, *góvu teir* Gō´-lăn í Bá´-sjăn við hennara útjaðarum, *at vera* ein griðsstaður hjá banaranum; og Bĕ-ĕsj´-tē-răh við hennara útjaðarum; tveir staðir.

28 Og burtur av ættargrein Ĭs´-să-chăr-s, Kĭ´-sjŏn við hennara útjaðarum, Dăb´-ă-rĕh við hennara útjaðarum,

29 Jâr´-mûth við hennara útjaðarum, Ĕn-găn´-nĭm við hennara útjaðarum; fýra staðir.

30 Og burtur av Ásjers ættargrein, Mĭ´-sjăl við hennara útjaðarum, Abdon við hennara útjaðarum,

31 Hĕl´-kăth við hennara útjaðarum, og Rē´-hŏb við hennara útjaðarum; fýra staðir.

32 Og burtur av Năph´-tâ-lĭ-s ættargrein, Kē´-dĕsj í Galilēu við hennara útjaðarum, *at vera* ein griðsstaður hjá banaranum; og Hăm´-mōth-dōr við hennara útjaðarum, og Kâr´-tăn við hennara útjaðarum; tríggjar staðir.

33 Allir staðirnir hjá Gĕr-sjŏn-ĭt´-unum samsvarandi við teirra familjur *vóru* trettan staðir við teirra útjaðarum.

34 ¶ Og innat familjunum av Mĕ-râr´-ĭ-s børnum, restini av Levitunum, burtur av Zē´-bŭ-lŏn-s ættargrein, Jŏk´-nĕ-ăm við hennara útjaðarum, og Kâr´-tăh við hennara útjaðarum,

35 Dĭm´-năh við hennara útjaðarum, Nā´-hă-lăl við hennara útjaðarum; fýra staðir.

36 Og burtur av Reûbens ættargrein, Bĕ´-zĕr við hennara útjaðarum, og Jă-hă´-zăh við hennara útjaðarum,

37 Kĕ´-dĕ-mōth við hennara útjaðarum, og Mĕph´-ā-ăth við hennara útjaðarum; fýra staðir.

38 Og burtur av Gáds ættargrein, Rá´-mōth í Gilead við hennara útjaðarum, *at vera* ein griðsstaður hjá banaranum; og Mă-há´-nă-ĭm við hennara útjaðarum,

39 Hĕsj´-bŏn við hennara útjaðarum, Já´-zĕr við hennara útjaðarum; fýra staðir í alt.

40 So allir staðirnir til Mĕ-râr´-ĭ-s barna eftir teirra familjum, sum vóru eftirverandi av familjunum hjá Levitunum, vóru *eftir* teirra luti tólv staðir.

41 Allir staðirnir hjá Levitunum innanfyri ogn Ísraels barna *vóru* fjøruti og átta staðir við teirra útjaðarum.

42 Hesir staðirnir vóru hvør *og* ēin við sínum útjaðarum rundan um teir: soleiðis *vóru* allir hesir staðirnir.

43 ¶ Og HARRIN gav Ísrael alt landið sum hann svór at geva fedrum teirra; og teir ognaðust tað, og dvaldust harí.

44 Og HARRIN gav teimum hvíld runt umkring, samsvarandi við alt sum hann svór teirra fedrum: og tað stóð ikki ein maður av øllum teirra fíggindum frammi fyri teimum; HARRIN flýggjaði allar teirra fíggindar inn í hond teirra.

45 Tað svitaðist ikki nakað av nøkrum góðum tingi, sum HARRIN hevði talað við Ísraels hús; øll bóru á.

KAPITUL 22

TÁ kallaði Josjua Reûbenitarnar, og Gáditarnar, og hálvu ættargrein Mă-năs´-sĕh,

2 Og segði við teir, Tit hava hildið alt sum Móses, tænari HARRANS, ábeyð tykkum, og hava lýtt mína rødd í øllum sum eg ábeyð tykkum:

3 Tit hava ikki eftirlatið tykkara brøður hesar mongu dagarnar at hesum degi, men hava hildið áleggingina av áboði HARRANS Guðs tykkara.

4 Og nú hevur HARRIN Guð tykkara givið hvíld innat brøðrum tykkara, eins og hann lovaði teimum: tessvegna nú, vendið tit

aftur, og sleppið tykkum at tjøldum tykkara, *og* at landinum av ogn tykkara, sum Móses, tænari HARRANS, gav tykkum hinumegin Jordan.

5 Men veitið dúgligan ans eftir at gera boðið og lógina, sum Móses, tænari HARRANS, álegði tykkum, at elska HARRAN Guð tykkara, og at ganga í øllum vegum hans, og at halda boðini hjá honum, og at krøkjast at honum, og at tæna honum við øllum tykkara hjarta og við allari tykkara sál.

6 So Josjua vælsignaði teir, og sendi teir avstað: og teir fóru at tjøldum sínum.

7 ¶ Nú, til ta *ēinu* helvtina av Mă-năs´-sĕh ættargrein hevði Móses givið *ogn* í Bá´-sjăn: men innat *hīnari* helvtini harav gav Josjua millum brøðra teirra hesumegin Jordan vestanfyri. Og tá ið Josjua sendi teir avstað eisini at tjøldum teirra, tá vælsignaði hann teir,

8 Og hann talaði við teir, sigandi, Vendið aftur við nógvum ríkidømum at tjøldum tykkara, og við sera nógvum fenaði, við silvuri, og við gulli, og við messingi, og við jarni, og við sera nógvum klædnaði: deilið fongin av figgindum tykkara við brøður tykkara.

9 ¶ Og Reûbens børn og Gáds børn og hálva ættargrein Mă-năs´-sĕh-s vendu aftur, og fóru avstað frá Ísraels børnum út úr Sjī´-lôh, sum *er* í landi Cánaans, til at fara at landi Gileads, til lands ognar sínar, hvarum teir vóru ognaðir, samsvarandi við orð HARRANS við^ hendi Móse.

10 ¶ Og tá ið teir komu at mørkum Jordans, sum *eru* í landi Cánaans, bygdu Reûbens børn og Gáds børn og hálva ættargrein Mă-năs´-sĕh har eitt altar við Jordan, eitt mikið altar at síggja til.

11 ¶ Og Ísraels børn hoyrdu sagt, Sí, Reûbens børn og Gáds børn og hálva ættargrein Mă-năs´-sĕh hava bygt eitt altar yvir av landi Cánaans, í mørkum Jordans, við yvirfaring Ísraels barna.

12 Og tá ið Ísraels børn hoyrdu *harum,* savnaði øll samkoma Ísraels barna seg saman í Sjī´-lôh, at fara niðan til kríggj ímóti teimum.

13 Og Ísraels børn sendu at Reûbens børnum, og til Gáds barna, og til hálvu ættargreinar Mă-năs´-sĕh, inn í land Gileads, Phī´-nĕ-hăs, son Ĕl-ĕ-á´-zâr prests,

14 Og við honum tíggju prinsar, av hvørjum fremsta húsi ein prins út gjøgnum allar ættargreinir Ísraels; og hvør *og* ēin *var* eitt høvd av húsi faðirs síns millum túsundir Ísraels.

15 ¶ Og teir komu at Reûbens børnum, og til Gáds barna, og til hálvu ættargreinar Mă-năs´-sĕh, at landi Gileads, og teir talaðu við teir, sigandi,

16 Svá sigur heila samkoma HARRANS, Hvat misbrot *er* hetta, sum tit hava framt ímóti Guði Ísraels, at venda burtur henda dag frá at fylgja HARRANUM, í at tit hava bygt tykkum eitt altar, at tit máttu gera uppreist henda dag ímóti HARRANUM?

17 *Er* misgerð Pē´-ôr-s ov lítil hjá okkum, frá hvørji vit eru ikki reinsaðir inntil henda dag, hóast har var ein plága í samkomu HARRANS,

18 Uttan at tit mugu venda burtur henda dag frá at fylgja HARRANUM? og tað vil verða, *við tað at* tit gera uppreist í dag ímóti HARRANUM, at í morgin vil hann verða vreiður við alla samkomu Ísraels.

19 Hóast hetta, um land ognar tykkara *veri seg* óreint, *tá* farið tit yvirum at landi ognar HARRANS, í hvørjum tabernakkul HARRANS

dvølist, og takið ogn okkara millum: men gerið ikki uppreist ímóti HARRANUM, ella gerið uppreist ímóti okkum, í at byggja tykkum eitt altar umframt altar HARRANS Guðs várs.

20 Framdi ikki Á-chăn Zē-râh sonur eitt misbrot í tí bannaða tinginum, og vreiði fell á alla samkomu Ísraels? og tann maðurin glataðist ikki einsamallur í síni misgerð.

21 ¶ Tá svaraðu Reûbens børn og Gáds børn og hálva ættargrein Mă-năs-sēh, og søgdu við høvdini av Ísraels túsundum,

22 HARRIN Guð guda, HARRIN Guð guda, hann veit, og Ísrael hann skal vita; um *tað veri* í uppreistri, ella um í misbroti ímóti HARRANUM, (bjarga okkum ikki henda dag,)

23 At vit hava bygt okkum eitt altar til at venda frá at fylgja HARRANUM, ella um til at ofra hará brennioffur ella matoffur, ella um til at ofra friðoffurˇ hará, lat HARRAN sjálvan krevja *tað;*

24 Og um vit hava ikki *heldur* gjørt tað av ótta fyri *hesum* luti, sigandi, Í komandi tíð kundu tykkara børn talað við okkara børn, sigandi, Hvat hava tit at gera við HARRAN Guð Ísraels?

25 Tí at HARRIN hevur gjørt Jordan *til* eitt mark ímillum okkum og tykkum, tit Reûbens børn og Gáds børn; tit hava ongan part í HARRANUM: so skulu tykkara børn fáa okkara børn at halda uppat frá at óttast HARRAN.

26 Tí søgdu vit, Latum okkum nú fyrireika at byggja okkum eitt altar, ikki til brennioffur, ella til sláturoffur:

27 Men *at* tað *má vera* eitt vitni ímillum okkum, og tykkum, og okkara ættir eftir okkum, at vit máttu gera tænastu HARRANS frammi fyri honum við okkara brenniofrum, og við okkara sláturofrum, og við okkara friðofrum; at tykkara børn mega ikki siga til børn okkara í komandi tíð, Tit hava ongan part í HARRANUM.

28 Tí søgdu vit, at tað skal verða, tá ið teir skuldu *soleiðis* siga til okkara ella til ættir okkara í komandi tíð, at vit mega siga *aftur,* Sí mynstur altars HARRANS, sum fedrar várir gjørdu, ikki til brennioffurˇ, ella til sláturoffurˇ; men tað *er* eitt vitni ímillum okkum og tykkum.

29 Guð sýti *fyri,* at vit skuldu gjørt uppreist ímóti HARRANUM, og venda henda dag frá at fylgja HARRANUM, at byggja eitt altar til brennioffurˇ, til matoffurˇ, ella til sláturoffurˇ, umframt altar HARRANS Guðs várs, sum *er* frammanfyri tabernakkul hansara.

30 ¶ Og tá ið Phī-nē-hăs prestur, og prinsarnir av samkomuni og høvdˇ av Ísraels túsundum, sum *vóru* við honum, hoyrdu orðini sum Reûbens børn og Gáds børn og Mă-năs-sēh børn talaðu, toknaði tað teimum.

31 Og Phī-nē-hăs, sonur Ĕl-ē-ā-zâr prests, segði við Reûbens børn, og til Gáds barna, og til Mă-năs-sēh barna, Henda dag varnast vit, at HARRIN *er* okkara millum, av tí at tit hava ikki framt hetta misbrot ímóti HARRANUM: nú hava tit útfríað børn Ísraels út úr hond HARRANS.

32 ¶ Og Phī-nē-hăs, sonur Ĕl-ē-ā-zâr prests, og prinsarnir, vendu aftur frá Reûbens børnum, og frá Gáds børnum, út úr landi Gileads, at landi Cānaans, til Ísraels barna, og bóru teimum orð aftur.

33 Og tingið toknaði Ísraels børnum; og Ísraels børn vælsignaðu Guð, og ætlaðu ikki at fara upp ímóti teimum í bardaga, at oyða landið, í hvørjum børn Reûbens og Gáds dvaldust.

34 Og Reûbens børn og Gáds børn kallaðu altarið *Ed:* tí at tað *skal vera* eitt vitni ímillum okkum, at HARRIN *er* Guð.

KAPITUL 23

OG tað bar á eina langa tíð eftir at HARRIN hevði givið Ísrael hvílu frá øllum teirra fíggindum runt umkring, at Josjua vaks gamal *og* sligin í aldri.

2 Og Josjua kallaði allan Ísrael, *og hinar* elstu teirra, og høvdini hjá teimum, og dómararnar hjá teimum, og yvirmenninar hjá teimum, og segði við teir, Eg eri gamal *og* sligin í aldri:

3 Og tit hava sæð alt sum HARRIN Guð tykkara hevur gjørt at øllum hesum tjóðunum uppá grund av tykkum; tí at HARRIN Guð tykkara *er* hann sum hevur barst fyri tykkum.

4 Sí, eg havi skift innat tykkum viðˆ luti hesar tjóðirnar sum eru eftir, at vera ein arvur hjá ættargreinum tykkara, frá Jordan, við øllum teimum tjóðunum sum eg havi skorið av, enntá at sjónum mikla vestanfyri.

5 Og HARRIN Guð tykkara, hann skal útreka tær frammi undan tykkum, og dríva tær út undan eygsjón tykkara; og tit skulu ognast land teirra, eins og HARRIN Guð tykkara hevur fyrijáttað tykkum.

6 Verið tit tessvegna sera mótsamir at halda og at gera alt, sum er skrivað í bók lógar Móse, at tit vendi ikki til viks harfrá *til* hinnar høgru handar ella *til* hinnar vinstru;

7 At tit komi ikki hesa tjóða millum, hesa, sum eru eftir tykkara millum; eiheldur fremji nevning á navni guda teirra, ella voldi at svørja *við teir,* eiheldur tæni teimum, ella boyggi tykkum at teimum:

8 Men krøkist at HARRANUM Guði tykkara, eins og tit hava gjørt at hesum degi.

9 Tí at HARRIN hevur rikið út frammi undan tykkum miklar tjóðir og sterkar: men *hvat* tykkum *viðvíkur,* eingin maður hevur verið førur fyri at standa frammi fyri tykkum at hesum degi.

10 Ēin maður av tykkum skal elta túsund: tí at HARRIN Guð tykkara, hann *tað er* sum berjist fyri tykkum, eins og hann hevur fyrijáttað tykkum.

11 Gevið væl gætur tessvegna at tykkum sjálvum, at tit elski HARRAN Guð tykkara.

12 Annars, um tit fari á nakran vís tilbakar, ella krøkist at leivdini av hesum tjóðunum, *enntá* hesum sum eru eftir tykkara millum, og skulu gera hjúnabond við tær, og fara inn at teimum, og tær til tykkara:

13 Vitið fyri eina fullvissu, at HARRIN Guð tykkara vil ikki meira reka út *nakrar av* hesum tjóðunum frammi undan tykkum; men tær skulu vera snerrur og fellur yvirfyri tykkum, og fleingjur í síðum tykkara, og tornir í eygum tykkara, inntil tit farist oman av hesum góða landi, sum HARRIN Guð tykkara hevur givið tykkum.

14 Og sí, henda dag fari eg veg alrar jarðarinnar: og tit vita í øllum hjørtum tykkara og í øllum sálum tykkara, at ikki ēitt ting hevur svitast av øllum teimum góðu tingunum, sum HARRIN Guð tykkara talaði viðvíkjandi tykkum; øll eru borin á hjá tykkum, *og* ikki ēitt ting hevur svitast harav.

15 Tí skal tað bera á, *at* eins og øll góð ting eru komin uppá tykkum, sum HARRIN Guð tykkara fyrijáttaði tykkum; soleiðis skal HARRIN føra uppá tykkum øll ill ting, inntil hann havi oytt tykkum oman av hesum góða landi, sum HARRIN Guð tykkara hevur givið tykkum.

16 Tá ið tit hava misbrotið sáttmála HARRANS Guðs tykkara, sum hann ábeyð tykkum, og hava farið og tænt øðrum gudum, og boygt tykkum sjálvar fyri teimum; tá skal HARRANS firtni verða kynd ímóti tykkum, og tit skulu farast fljótligani oman av tí góða landi, sum hann hevur givið tykkum.

KAPITUL 24

OG Josjua savnaði allar ættargreinir Ísraels til Sjē´-chĕm, og kallaði teir elstu av Ísrael, og høvdini hjá teimum, og dómararnar hjá teimum, og yvirmenninar hjá teimum; og teir framsettu seg sjálvar framfyri Guð.

2 Og Josjua segði við alt fólkið, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Tykkara fedrar dvaldust hīnumegin flóð*ánna* í gamlari tíð, *enntá* Tē´-râh, faðir Ábrahams, og faðir Ná´-chôr-s: og teir tæntu øðrum gudum.

3 Og eg tók tykkara faðir Ábraham frá hīnari síðuni av flóð*ánni,* og leiddi hann ígjøgnum alt land Cānaans, og margfaldaði sáð hansara, og gav honum Ísaak.

4 Og eg gav at Ísaaki Jákob og Esav: og eg gav at Esavi Sē´-īr fjall, at ognast tað; men Jákob og børn hansara fóru niður í Egyptaland.

5 Eg sendi Móses eisini og Aaron, og eg plágaði Egyptaland, samsvarandi við tað sum eg gjørdi teirra millum: og síðan førdi eg tykkum út.

6 Og eg førdi tykkara fedrar út úr Egyptalandi: og tit komu at sjónum; og Egyptarnir eltu eftir fedrum tykkara við vagnum og hestmonnum at Reyða-havinum.

7 Og tá ið teir róptu á HARRAN, setti hann myrkur ímillum tykkum og Egyptarnar, og førdi sjógvin uppá teir, og dekkaði teir; og tykkara eygu hava sæð *tað* sum eg havi gjørt í Egyptalandi: og tit dvaldust í oyðuni eitt langt skeið.

8 Og eg førdi tykkum inn í land Amoritanna, sum dvaldust hīnumegin Jordan; og teir bardust við tykkum: og eg gav teir inn í hond tykkara, at tit máttu ognast land teirra; og eg oyddi teir frammi undan tykkum.

9 Tá reisti *seg* Bálak Zīp´-pôr-s sonur, kongur av Móab, og kríggjaðist ímóti Ísrael, og sendi og kallaði Bá´-lāām Bē´-ôr-s son at bølbiðja tykkum:

10 Men eg vildi ikki lýða á Bá´-lāām; tí vælsignaði hann tykkum støðugt: so eg útfríaði tykkum út úr hond hansara.

11 Og tit fóru yvirum Jordan, og komu at Jericho: og menninir úr Jericho bardust ímóti tykkum, Amoritarnir, og Pê-rĭz-zīt´-arnir, og Cānaanitarnir, og Hittitarnir, og Gĭr-gă-sjīt´-arnir, Hī-vīt´-arnir, og Jĕb-ū-sīt´-arnir; og eg flýggjaði teir inn í hond tykkara.

12 Og eg sendi vespuna undan tykkum, sum rak teir út frammi fyri tykkum ífrá, *enntá* teir tveir kongarnar hjá Amoritunum; *men* ikki við svørði tínum, ella við boga tínum.

13 Og eg havi givið tykkum eitt land, fyri hvørt tit strevaðust ikki; og staðir, sum tit bygdu ikki, og tit dvøljast í teim; av víngørðunum og olivingørðum, sum tit plantaðu ikki, eta tit.

14 ¶ Nú tessvegna, óttist HARRAN, og tænið honum í ærligleika og í sannleika: og koyrið burtur gudarnar, sum tykkara fedrar tæntu hīnumegin flóð*ánna,* og í Egyptalandi; og tænið tit HARRANUM.

15 Og um tað tyki ilt yvirfyri tykkum at tæna HARRANUM, veljið tykkum henda dag, hvørjum tit vilja tæna; hvørt gudunum sum fedrar tykkara tæntu, sum

vóru hīnumegin flóð*ánna*, ella gudunum hjá Amoritunum, í hvørs landi tit dvøljast: men hvat meg og hús mítt varðar, vit vilja tæna HARRANUM.

16 Og fólkið svaraði og segði, Guð sýti *fyri,* at vit skuldu yvirgivið HARRAN, til at tæna øðrum gudum;

17 Tí at HARRIN Guð vár, hann *tað er* sum førði okkum upp, og fedrar várar, út úr Egyptalandi, frá trældóms-húsinum, og sum gjørdi hasi miklu teknini í eygsjón okkara, og varðveitti okkum á øllum veginum, hvará vit fóru, og alra fólkanna millum, ígjøgnum hvørji vit fóru:

18 Og HARRIN rak út frammi undan okkum øll fólkini, enntá Amoritarnar, sum dvaldust í landinum: *tessvegna* viljum vær eisini tæna HARRANUM; tí at hann *er* Guð vár.

19 Og Josjua segði við fólkið, Tit kunnu ikki tæna HARRANUM: tí at hann *er* ein heilagur Guð; hann *er* ein ástbrellin Guð; hann vil ikki fyrigeva misbrotˇ tykkara, ella syndir tykkara.

20 Um tit yvirgevi HARRAN, og tæni fremmandum gudum, so vil hann venda og gera tykkum mein, og upptæra tykkum, eftir at hann hevur gjørt tykkum gott.

21 Og fólkið segði við Josjua, Nei; men vær viljum tæna HARRANUM.

22 Og Josjua segði við fólkið, Tit *eru* vitnir ímóti tykkum sjálvum, at tit hava valt tykkum HARRAN, at tæna honum. Og teir søgdu, *Vit eru* vitnir.

23 Nú tessvegna, koyrið burtur, *segði hann,* teir fremmandu gudarnar, sum *eru* tykkara millum, og bendið tykkara hjarta at HARRANUM Guði Ísraels.

24 Og fólkið segði við Josjua, HARRANUM Guði várum viljum vær tæna, og rødd hansara viljum vær lýða.

25 So Josjua gjørdi sáttmála við fólkið tann dagin, og setti teimum eina áseting og eina regluskipan í Sjē´-chĕm.

26 ¶ Og Josjua skrivaði hesi orð í bók lógar Guðs, og tók ein miklan stein, og setti hann upp har undir eini eik, sum *var* hjá halgidómi HARRANS.

27 Og Josjua segði við alt fólkið, Sí, hesin steinurin skal vera eitt vitni at okkum; tí at hann hevur hoyrt øll orðini hjá HARRANUM, sum hann talaði við okkum: hann skal tessvegna vera eitt vitni at tykkum, at ikki tit avnokti Guð tykkara.

28 So Josjua læt fólkið fara avstað, hvønn mann at arvi sínum.

29 ¶ Og tað bar á eftir hesi tingini, at Josjua Nuns sonur, tænari HARRANS, doyði, *verandi* eitt hundrað og tíggju ára gamalur.

30 Og teir jarðaðu hann í marki arvs hansara í Tĭm´-năth-sē´-răh, sum *er* á Ē´-phră-ĭm fjalli, á norður síðuni av Gā´-ăsj heyggi.

31 Og Ísrael tænti HARRANUM allar dagar Josjua, og allar dagar teirra elstu, sum útlivdu Josjua, og sum høvdu kent øll verk HARRANS, sum hann hevði gjørt fyri Ísrael.

32 ¶ Og beinini hjá Jósephi, hvørji børn Ísraels førdu upp út úr Egyptalandi, jarðaðu teir í Sjē´-chĕm, í einum jarðarstykki, sum Jákob keypti av sonum Há´-mŏr-s, faðir Sjē´-chĕm-s, fyri eitt hundrað stykkir av silvuri: og tað gjørdist arvur Jósephs barna.

33 Og Ĕl-ē-ā´-zâr, sonur Aarons, doyði; og teir jarðaðu hann á einum heyggi, *sum hoyrdi til* Phĭ´-nē-hās, son hansara, sum varð givin honum á Ē´-phră-ĭm fjalli.

DÓMARABÓKIN.

KAPITUL 1

NÚ, eftir deyða Josjua bar tað á, at Ísraels børn spurdu HARRAN, sigandi, Hvør skal fara niðan fyri okkum ímóti Cānaanitunum fyrst, at berjast ímóti teimum?

2 Og HARRIN segði, Judah skal fara niðan: sí, eg havi flýggjað landið inn í hond hansara.

3 Og Judah segði við Símeon, bróður sín, Kom niðan við mær inn í lut mín, at vit mega berjast ímóti Cānaanitunum; og eg líkaleiðis vil fara við tær inn í lut tín. So Símeon fór við honum.

4 Og Judah fór niðan; og HARRIN flýggjaði Cānaanitarnar og Pê-rīz-zīt´-arnar inn í hond teirra: og teir vógu av teimum í Bē´-zĕk tíggju túsund mans.

5 Og teir funnu Ăd´-ō-nī-bē´-zĕk í Bē´-zĕk: og teir bardust ímóti honum, og teir vógu Cānaanitarnar og Pê-rīz-zīt´-arnar.

6 Men Ăd´-ō-nī-bē´-zĕk flýddi; og teir eltu eftir honum, og fangaðu hann, og skóru av tumlarnar hjá honum og stórutærnar hjá honum.

7 Og Ăd´-ō-nī-bē´-zĕk segði, Trísinstjúgu og tíggju kongar, havandi sínar tumlar og sínar stórutær skornar av, savnaðu *sín mat* undir borð mítt: eins og eg havi gjørt, soleiðis hevur Guð viðurgoldið mær. Og teir førdu hann til Jerusalem, og har doyði hann.

8 Nú, Judah børn høvdu barst ímóti Jerusalem, og høvdu tikið tað, og sligið tað við svørðseggini, og sett eld á staðin.

9 ¶ Og síðan fóru Judah børn oman at berjast ímóti Cānaanitunum, sum dvaldust á fjallinum, og í sunnan, og í dalinum.

10 Og Judah fór ímóti Cānaanitunum sum dvaldust í Hē´-brŏn: (nú, navnið á Hē´-brŏn áður *var* Kīr´-jăth-ăr´-bă:) og teir vógu Sjē´-sjâi, og Á´-hĭ-măn, og Tăl´-mâi.

11 Og haðani frá fór hann ímóti íbúgvunum av Dē´-bîr: og navnið á Dē´-bîr áður *var* Kīr´-jăth-sē´-phĕr:

12 Og Caleb segði, Hann, ið slær Kīr´-jăth-sē´-phĕr, og tekur hann, til hansara vil eg geva Ăch´-sūh, dóttur mína, til ektakonu.

13 Og Ōth´-nĭ-ĕl, sonur Kē´-năzar, yngri bróðir Calebs, tók hann: og hann gav honum Ăch´-sūh, dóttur sína, til ektakonu.

14 Og tað bar á, tá ið hon kom *til hansara,* at hon rørdi hann at umbiðja av faðir sínum ein akur: og hon lætti *sær* niður av asna *sínum;* og Caleb segði við hana, Hvat vilt tú?

15 Og hon segði við hann, Gev mær eina signing: tí at tú hevurt givið mær eitt suður land; gev mær eisini lindir av vatni. Og Caleb gav henni hinar ovaru lindir og hinar niðaru lindir.

16 ¶ Og børnini hjá Kē-nīt´-anum, verfaðir Mósesar, fóru upp út úr pálmatræa-staðinum við Judah børnum inn í Judah oyðu, sum *liggur* í suður Ár´-ăd; og teir fóru og dvaldust millum fólksins.

17 Og Judah fór við Símeoni, bróður sínum, og teir vógu Cānaanitarnar, sum íbúðu Zē´-phăth, og aldeilis oyddu hann. Og navnið á staðinum varð kallað Hŏr´-măh.

18 Judah eisini tók Gă´-zá við bredda tess, og Ăs´-kĕ-lōn við bredda tess, og Ēk´-rōn við bredda tess.

19 Og HARRIN var við Judah; og hann rak út *íbúgvar* fjallsins; men kundi ikki reka út íbúgvar

dalsins, av tí at teir høvdu vagnar av jarni.

20 Og teir góvu Hē´-brŏn innat Calebi, eins og Móses segði: og hann útrak haðani hinar tríggjar synir Ánaks.

21 Og Benjamins børn róku ikki út Jĕb-ū-sīt´-arnar, sum íbúðu Jerusalem; men Jĕb-ŭ-sīt´-arnir dvøljast við Benjamins børnum í Jerusalem at hesum degi.

22 ¶ Og Jóseph̲s hús, teir eisini fóru upp ímóti Bethel: og HARRIN *var* við teimum.

23 Og Jóseph̲s hús sendi til *tess* at kanna út Beth-el. (Nú, navnið á staðinum áður *var* Lūz.)

24 Og njósnararnir sóu ein mann koma fram út úr staðinum, og teir søgdu við hann, Sýn okkum, vit biðja teg, inngongdina inn í staðin, og vit vilja sýna tær miskunn.

25 Og tá ið hann sýndi teimum inngongdina inn í staðin, slógu teir staðin við svørðseggini; men teir lótu fara mannin og alla familju hansara.

26 Og maðurin fór inn í land Hittitanna, og bygdi ein stað, og kallaði navnið á honum Lūz: sum *er* navnið hará at hesum degi.

27 ¶ Eiheldur rak Mă-năs´-sēh út *íbúgvarnar av* Bĕth-sjē´-ăn og hennara býum, ella Tā´-ă-nă̲ch og hennara býum, ella íbúgvarnar av Dōr og hennara býum, ella íbúgvarnar av Ĭb´-lē-ăm og hennara býum, ella íbúgvarnar av Mĕ-gĭd´-dō og hennara býum: men Cānaanitarnir mundu búgva í tí landinum.

28 Og tað bar á, tá ið Ísrael var sterkt, at teir settu Cānaanitarnar til íkast, og róku teir ikki aldeilis út.

29 ¶ Eiheldur rak Ē´-phr̲ă-ĭm út Cānaanitarnar, sum dvaldust í Gē´-zĕr; men Cānaanitarnir dvaldust í Gē´-zĕr teirra millum.

30 ¶ Eiheldur rak Zē´-bŭ-lŏn út íbúgvarnar av Kĭt´-rŏn, ella íbúgvarnar av Nā´-hă-lŏl; men Cānaanitarnir dvaldust teirra millum, og gjørdust íkastsskyldigir.

31 ¶ Eiheldur rak Ásjer út íbúgvarnar av Ăc´-ch̲ō, ella íbúgvarnar av Zĭ´-dŏn, ella av Âh´-lăb, ella av Ăch̲´-zīb, ella av Hĕl´-băh, ella av Ā´-ph̲īk, ella av Rē´-hŏb:

32 Men Ásjeritarnir dvaldust Cānaanitanna millum, íbúgva landsins: tí at teir róku teir ikki út.

33 ¶ Eiheldur rak Năph̲´-tâ-lī út íbúgvarnar av Bĕth´-sjē´-mĕsj, ella íbúgvarnar av Bĕth-á´-năth; men hann dvaldist Cānaanitanna millum, íbúgva landsins: hóast hetta, íbúgvarnir av Bĕth´-sjē´-mĕsj og av Bĕth-á´-năth gjørdust íkastsskyldigir at teimum.

34 Og Amoritarnir tvingaðu Dáns børn niðan á fjallið: tí at teir vildu ikki loyva teimum at koma oman til dalin:

35 Men Amoritarnir mundu dvøljast á Hē´-rēs fjalli í Aĭ´-jă-lŏn, og í Sjā-ăl´-bĭm: tó hevði hond Jóseph̲s húss yvirvág, so at teir gjørdust íkastsskyldigir.

36 Og breddin hjá Amoritunum *var* frá niðanfaringini til Ăk-răb´-bĭm, frá klettinum, og niðaneftir.

KAPITUL 2

OG ein eingil HARRANS kom niðan frá Gĭl´-găl til Bō´-ch̲ĭm, og segði, Eg fekk tykkum at fara upp út úr Egyptalandi, og havi ført tykkum at landinum sum eg svór fedrum tykkara; og eg segði, Eg vil aldri bróta mín sáttmála við tykkum.

2 Og tit skulu einkið bandalag gera við íbúgvarnar av hesum landi; tit skulu kasta niður altarini hjá teimum: men tit hava ikki lýtt mína rødd: hví hava tit gjørt hetta?

3 Hvørsvegna eg eisini segði, Eg vil ikki reka teir út frammi undan tykkum; men teir skulu

vera *sum tornir* í síðum tykkara, og teirra gudar skulu vera ein snerra at tykkum.

4 Og tað bar á, tá ið eingil HARRANS talaði hesi orðini við øll børn Ísraels, at fólkið lyfti upp rødd sína, og græt.

5 Og teir kallaðu navnið á tí plássinum Bō´-chīm: og teir sláturofraðu har at HARRANUM.

6 ¶ Og tá ið Josjua hevði latið fólkið fara, fóru børn Ísraels hvør maður at arvi sínum at ognast landið.

7 Og fólkið tænti HARRANUM allar dagar Josjua, og allar dagarnar hjá teimum elstu sum útlivdu Josjua, hvørjir sæð høvdu øll hini miklu verk HARRANS, sum hann gjørdi fyri Ísrael.

8 Og Josjua Nuns sonur, tænari HARRANS, doyði, *verandi* eitt hundrað og tíggju ára gamalur.

9 Og teir jarðaðu hann í marki arvs hans í Tīm´-năth-hē´-rēs, á Ē´-phră-ĭm-s fjalli, á norður síðuni av heygnum Gá´-ăsj.

10 Og eisini øll tann ættin vórðu savnaðir at fedrum sínum: og tað reistist eitt annað ættarlið eftir teir, sum kendi ikki HARRAN, ella tá verkini sum hann hevði gjørt fyri Ísrael.

11 ¶ Og Ísraels børn gjørdu ilt í eygsjón HARRANS, og tæntu Bā´-ă-lĭm:

12 Og teir yvirgóvu HARRAN Guð fedra sína, sum førdi teir út úr Egyptalandi, og fylgdu øðrum gudum, av gudunum hjá fólkinum sum *vóru* rundan um teir, og boygdu seg sjálvar at teimum, og tirraðu HARRAN til firtnis.

13 Og teir yvirgóvu HARRAN, og tæntu Bā´-ăl-i og Ăsj´-tă-rōth.

14 ¶ Og HARRANS firtni varð heit ímóti Ísrael, og hann flýggjaði teir inn í hendurnar á rænarum, sum rændu teir, og hann seldi teir inn í hendurnar á teirra fíggindum rundan um, so at teir kundu ikki longur standast frammi fyri fíggindum sínum.

15 Hvagarsumhelst *ið* teir fóru út, HARRANS hond var ímóti teimum til ilt, eins og HARRIN hevði sagt, og eins og HARRIN hevði svorið teimum: og teir vóru stórliga neyðstaddir.

16 ¶ Hóast hetta, HARRIN reisti upp dómarar, sum útfríaðu teir út úr hondini á teimum sum rændu teir.

17 Og tó vildu teir ikki lýða á dómarar sínar, men teir fóru horandi eftir øðrum gudum, og boygdu seg sjálvar at teimum: teir vendu snarligani út av veginum sum fedrar teirra gingu á, lýðandi boðini hjá HARRANUM; *men* teir gjørdu ikki soleiðis.

18 Og tá ið HARRIN reisti teimum upp dómarar, tá var HARRIN við dómaranum, og útfríaði teir út úr hondini á teirra fíggindum allar dagar dómarans: tí at tað iðraði HARRAN vegna teirra eymkanir, uppá grund av teimum sum kúgaðu teir og plágaðu teir.

19 Og tað bar á, tá ið dómarin var deyður, *at* teir vendu aftur, og spiltu *seg sjálvar* meir enn fedrar teirra, í at fylgja øðrum gudum til at tæna teimum, og at boyggjast niður at teimum; teir hildu ikki uppat frá egnu gerðum sínum, ella frá treiska vegi sínum.

20 ¶ Og HARRANS firtni varð heit ímóti Ísrael; og hann segði, Av tí at hetta fólkið hevur misbrotið sáttmála mín, sum eg ábeyð fedrum teirra, og hava ikki givið gætur at rødd míni;

21 Eg eisini vil hiðanífrá ikki reka út nakran frammi fyri teimum ífrá av tjóðunum sum Josjua eftirlæt, tá ið hann doyði:

22 At, ígjøgnum teir, eg má royna Ísrael, hvørt teir vilji halda veg HARRANS til at ganga hari, eins og fedrar teirra hildu *hann,* ella ikki.

23 Tí eftirlæt HARRIN hasar tjóðirnar, uttan at reka tær út skundisliga; eiheldur flýggjaði hann tær inn í hond Josjua.

KAPITUL 3

NÚ, hetta *eru* tjóðirnar sum HARRIN eftirlæt, til at royna Ísrael viðˆ teimum, *enntá* so mangar *av Ísrael* sum ikki høvdu kent øll kríggj Cānaans;

2 Einans *fyri* at ættarliðirnir av Ísraels børnum máttu vita, *fyri* at læra teir kríggj, í minsta lagi slíkar sum áður vitstu einkið harum;

3 *Nevniliga,* fimm fúrstar hjá Philistunum, og allar Cānaanitarnar, og Sī-dō´-nī-ararnar, og Hī-vīt´-arnar, sum dvaldust á Lī´-bă-nōn fjalli, frá Bā´-ăl-hĕr´-mōn fjalli at innfaring Há´-măth-s.

4 Og teir vóru til at royna Ísrael viðˆ teimum, at vita, hvørt teir vildu lýða boðini hjá HARRANUM, sum hann ábjóðaði teirra fedrum viðˆ hendi Móse.

5 ¶ Og Ísraels børn dvaldust millum Cānaanitanna, Hittitanna, Amoritanna, Pē-rīz-zīt´-anna, Hī-vīt´-anna, og Jĕb-ŭ-sīt´-anna:

6 Og teir tóku teirra døtur til at vera ektakonur sínar, og góvu sínar døtur til sona teirra, og tæntu gudum teirra.

7 Og Ísraels børn gjørdu ilt í eygsjón HARRANS, og gloymdu HARRAN Guð sín, og tæntu Bā´-ălīm og lundunum.

8 ¶ Tí varð HARRANS firtni heit ímóti Ísrael, og hann seldi teir inn í hondina á Chŭ´-sjăn-rīsj-ă-thā´-īm kongi av Mē-sō-pō-tá´-mī-ŭ: og Ísraels børn tæntu Chŭ´-sjăn-rīsj-ă-thā´-īm átta ár.

9 Og tá ið Ísraels børn róptu á HARRAN, reisti HARRIN upp ein útfríara fyri Ísraels børnum, sum útfríaði teir, *enntá* Ōth´-nī-ĕl Kē´-năz-ar son, yngra bróður Calebs.

10 Og Andi HARRANS kom uppá hann, og hann dømdi Ísrael, og fór út til kríggj: og HARRIN flýggjaði Chŭ´-sjăn-rīsj-ă-thā´-īm kong av Mē-sō-pō-tá´-mī-ŭ inn í hond hans; og hans hond hevði yvirvág ímóti Chŭ´-sjăn-rīsj-ă-thā´-īm.

11 Og landið hevði hvíld fjøruti ár. Og Ōth´-nī-ĕl Kē´-năz-ar sonur doyði.

12 ¶ Og børn Ísraels gjørdu ilt aftur í eygsjón HARRANS: og HARRIN styrkti Ēg´-lōn, Móabs kong, ímóti Ísrael, av tí at teir høvdu gjørt ilt í eygsjón HARRANS.

13 Og hann savnaði at sær børn Ammons og Ā´-mâ-lĕk-s, og fór og sló Ísrael, og *tók* til ognar pálmatræa-staðin.

14 So Ísraels børn tæntu Ēg´-lōn kongi av Móab átjan ár.

15 Men tá ið Ísraels børn róptu á HARRAN, reisti HARRIN teimum upp ein útfríara, Ē´-hŭd Gē´-ră son, ein Benjamit, ein lámur maður: og viðˆ honum sendu Ísraels børn eina gávu at Ēg´-lōn-i, Móabs kongi.

16 Men Ē´-hŭd gjørdi sær eitt smásvørð, sum hevði tvær eggir, eina alin til longdar; og hann gyrdi tað undir klædnað sín uppiá høgru lend síni.

17 Og hann kom við gávuni at Ēg´-lōn kongi av Móab: og Ēg´-lōn *var* ein sera feitur maður.

18 Og tá ið hann hevði lokið *við* at frambera gávuna, sendi hann avstað fólkið sum bar gávuna.

19 Men sjálvur hann vendi aftur frá grótbrotunum, sum *vóru* við Gīl´-găl, og segði, Eg havi eitt loyniligt ørindi at tær, O kongur: hvør segði, Halt tøgn. Og allir, sum stóðu hjá honum, fóru út frá honum.

20 Og Ē´-hŭd kom at honum; og hann sat í einum summar taksali, sum hann hevði til sín sjálvs einsamallan. Og Ē´-hŭd segði, Eg havi ein boðskap frá

Guði at tær. Og hann reistist úr sæti *sínum*.

21 Og Ē´-hŭd setti fram sína vinstru hond, og tók smásvørðið frá síni vinstru lend, og stoytti tað inn í búk hansara:

22 Og handtakið eisini fór inn eftir blaðinum; og feittið lokaði uppá blaðið, so at hann kundi ikki draga smásvørðið út úr búki hansara; og skarnið kom út.

23 So fór Ē´-hŭd fram gjøgnum súlnagangin, og lokaði dyrnar á taksalinum eftir seg, og læsti tær.

24 Tá ið hann var farin út, komu tænarar hansara; og tá ið teir sóu, at sí, dyrnar á taksalinum *vóru* læstar, søgdu teir, Vissuliga dekkar hann føtur sínar í summar kamari sínum.

25 Og teir dvaldu til teir skammaðust: og sí, hann opnaði ikki dyrnar á taksalinum; tí tóku teir ein lykil, og opnaðu *tær:* og sí, teirra harri *var* fallin niður deyður á jørðini.

26 Og Ē´-hŭd komst undan, meðan teir dvaldu, og fór yvir handan grótbrotini, og komst undan at Sē-ī´-răth.

27 Og tað bar á, tá ið hann var komin, at hann blásti ein lúður á Ē´-phră-ĭm-s fjalli, og Ísraels børn fóru oman við honum frá fjallinum, og hann undan teimum.

28 Og hann segði við teir, Fylgið eftir mær: tí at HARRIN hevur flýggjað tykkara fíggindar, Móabitarnar, inn í hond tykkara. Og teir fóru oman eftir honum, og tóku vaðini av Jordan ímóti Móab, og loyvdu ikki manni at fara yvirum.

29 Og teir vógu av Móab á teirri tíð umleið tíggju túsund mans, allir ramligir, og allir reystsemis menn; og tað komst ikki undan maður.

30 So Móab varð undirlagt tann dagin undir Ísraels hond. Og landið hevði hvílu fýrsinstjúgu ár.

31 ¶ Og eftir hann var Sjăm´-gâr Á´-năth-s sonur, sum vá av Philistunum seks hundrað menn við einum oksa píkstavi: og hann eisini útfríaði Ísrael.

KAPITUL 4

OG Ísraels børn aftur gjørdu ilt í eygsjón HARRANS, tá ið Ē´-hŭd var deyður.

2 Og HARRIN seldi teir inn í hondina á Jā´-bĭn kongi av Cānaan, sum ríkti í Hā´-zôr, høvuðsmaður av hvørs herliði *var* Sī´-sĕ-ră, sum dvaldist í Hă-rō´-sjēth Heidninganna.

3 Og Ísraels børn róptu á HARRAN: tí at hann hevði níggju hundrað vagnar av jarni; og tjúgu ár mektigani kúgaði hann Ísraels børn.

4 ¶ Og Dē´-bôr-ăh, ein prophetinna, ektakona Lăp´-ī-dōth-s, hon dømdi Ísrael á teirri tíð.

5 Og hon dvaldist undir pálmatræi Dē´-bôr-ŭh ímillum Rá´-măh og Beth-el á Ē´-phră-ĭm fjalli: og Ísraels børn komu niðan til hennara til dóms.

6 Og hon sendi og kallaði Bâr´-ăk Ă-bĭn´-ō-ăm-s son úr Kē´-dĕsj-năph´-tâ-lī, og segði við hann, Hevur ikki HARRIN Guð Ísraels áboðið, *sigandi,* Far og dregst ímóti Tā´-bôr fjalli, og tak við tær tíggju túsund mans av Năph´-tâ-lī-s børnum og av Zē´-bŭ-lŏn-s børnum?

7 Og eg vil draga at tær til ánna Kī´-sjŏn Sī´-sĕ-ră, høvuðsmannin av heri Jā´-bĭn-s, við hansara vagnum og mannfjøld hans; og eg vil flýggja hann inn í hond tína.

8 Og Bâr´-ăk segði við hana, Um tú vilt fara við mær, tá vil eg fara: men um tú vilt ikki fara við mær, *tá* vil eg ikki fara.

9 Og hon segði, Eg vil vissuliga fara við tær: hóast hetta, ferðin, sum tú tekurt, skal ikki vera til

tína æru; tí at HARRIN skal selja Sí´sĕ-ră inn í hondina á eini kvinnu. Og Dĕ´-bôr-ăh reistist, og fór við Bâr´-ăk-i til Kĕ´-dĕsj.

10 ¶ Og Bâr´-ăk kallaði Zĕ´-bŭlŏn og Năph´-tâ-lī til Kĕ´-dĕsj; og hann fór niðan við tíggju túsund monnum við føtur sínar: og Dĕ´-bôr-ăh fór niðan við honum.

11 Nú, Hĕ´-bĕr Kē-nĭt´-i, *sum var* av børnum Hó´-dăb-s, verfaðir Mósesar, hevði atskilt seg sjálvan frá Kē-nĭt´-unum, og sló upp tjald sítt at slætta Zā-ă-nā´-ĭm-s, sum *er* við Kĕ´-dĕsj.

12 Og teir sýndu Sí´sĕ-ră, at Bâr´-ăk Ă-bĭn´-ŏ-ăm-s sonur var farin niðan til Tă´-bôr fjalls.

13 Og Sí´sĕ-ră savnaði saman allir vagnar sínar, *enntá* níggju hundrað vagnar av jarni, og alt fólkið sum *vóru* við honum, frá Hă-rō´-sjĕth Heidninganna at Kí´sjŏn-s ánni.

14 Og Dĕ´-bôr-ăh segði við Bâr´-ăk, Upp; tí at hetta *er* dagurin, í hvørjum HARRIN hevur flýggjað Sí´sĕ-ră inn í hond tína: er ikki HARRIN farin út undan tær? So Bâr´-ăk fór oman frá Tă´-bôr fjalli, og tíggju túsund mans eftir honum.

15 Og HARRIN avhólvaði Sí´sĕ-ră, og allar vagnar *hansara,* og alt herlið *hansara,* við svørðseggini frammi fyri Bâr´-ăk-i; so at Sí´sĕ-ră lætti *sær* niður av vagni *sínum,* og flýddi burtur á fótum sínum.

16 Men Bâr´-ăk elti eftir vagnunum, og eftir herliðinum, at Hă-rō´-sjĕth Heidninganna: og alt herliðið hjá Sí´sĕ-ră fell uppá svørðseggina; *og* har var ikki maður eftir.

17 Hóast hetta, Sí´sĕ-ră flýddi avstað á fótum sínum til tjald Jă´ĕl-ar, ektakonu Hĕ´-bĕr-s Kē-nĭt´-a: tí at *tað var* friður ímillum Jă´-bĭn, kong Hă´-zôr-s, og hús Hĕ´-bĕr-s Kē-nĭt´-a.

18 ¶ Og Jă´-ĕl fór út at møta Sí´sĕ-ră, og segði við hann, Vend inn, harri mín, vend inn til mín; óttast ikki. Og tá ið hann hevði vent inn at henni inn í tjaldið, dekkaði hon hann við einum kappa.

19 Og hann segði við hana, Gev mær, eg biði teg, eitt sindur *av* vatni at drekka; tí eg eri tyrstur. Og hon opnaði ein kík av mjólk, og gav honum drekka, og dekkaði hann.

20 Aftur segði hann við hana, Statt í dyrnum av tjaldinum, og tað skal verða, tá ið nakar maður komi og fregni av tær, og sigi, Er tað nakar maður her? at tú skalt siga, Nei.

21 Tá tók Jă´-ĕl, ektakona Hĕ´-bĕr-s, ein nagla av tjaldinum, og tók ein hamara í sína hond, og fór ljódligani at honum, og slóð naglan inn í tynningar hans, og festi hann í jørðina: tí at hann var *í* fasta svøvni og móður. So hann doyði.

22 Og sí, sum Bâr´-ăk elti Sí´sĕ-ră, kom Jă´-ĕl út at møta honum, og segði við hann, Kom, og eg vil sýna tær mannin, hvønn tú søkirt. Og tá ið hann kom inn í *tjald* hennara, sí, Sí´sĕ-ră lá deyður, og naglin *var* í tynningum hans.

23 So Guð undirlegði á tí degi Jă´-bĭn, kong Cānaans, frammi fyri børnum Ísraels.

24 Og hond Ísraels barna framgekk, og hevði yvirvág ímóti Jă´-bĭn, kongi Cānaans, inntil teir høvdu oytt Jă´-bĭn kong av Cānaan.

KAPITUL 5

TÁ sungu Dĕ´-bôr-ăh og Bâr´-ăk Ă-bĭn´-ŏ-ăm-s sonur á tí degi, sigandi,

2 Prísið tit HARRANUM fyri hevningina av Ísrael, tá ið fólkið viljugani ofraðu seg sjálv.

3 Hoyrið, O tit kongar; lænið oyra, O tit prinsar; eg, *enntá* eg,

vil syngja at HARRANUM; eg vil syngja *lov* til HARRANS Guðs Ísraels.

4 HARRI, tá ið tú fórt út úr Sē´-īr, tá ið tú skrúðgekst út úr akri Ē´-dóm-s, jørðin nøtraði, og himnarnir drúpu, skýggini eisini drúpu vatn.

5 Fjøllini smeltaðu frammi fyri HARRANUM ífrá, *enntá* hatta Sī´-nâi frammi undan HARRANUM Guði Ísraels.

6 Á døgum Sjăm´-gâr-s Ánaths sonar, á døgum Jā´-ĕl-ar, vóru høvuðsvegirnir óvirknir, og ferðamenninir gingu gjøgn hjávegir.

7 *Íbúgvarnir av* bygdunum hildu uppat, teir hildu uppat í Ísrael, inntil ið eg, Dē´-bôr-ăh, reistist, ið eg reistist ein móðir í Ísrael.

8 Teir valdu nýggjar gudar; tá *var* kríggj í portrunum: sást ein skjøldur ella spjót millum fjøruti túsund í Ísrael?

9 Mítt hjarta *er* mótvegis landsstjórum Ísraels, sum ofraðu seg sjálvar viljugani millum fólksins. Vælsignið tit HARRAN.

10 Talið, tit sum ríða á hvítum asnum, tit sum sita í dómi, og ganga eftir veginum.

11 *Teir, sum eru útfríaðir* frá róminum av bogaskjúttum í vatndragingar-plássunum, har skulu teir fara yvir aftur hinar rættvísu gerningar HARRANS, *enntá* hinar rættvísu gerningar *mót íbúgvunum* av hansara bygdum í Ísrael: tá skulu fólk HARRANS fara oman til portrini.

12 Vakna, vakna, Dē´-bôr-ăh: vakna, vakna, mæl ein song: reis *teg*, Bâr´-ăk, og leið fangaskap tín *til* fanga, tú Ă-bĭn´-ō-ăm-s sonur.

13 Tá fekk hann hann, sum er eftir, *at* hava harradømi yvir tignarmonnunum millum fólksins: HARRIN fekk meg *at* hava harradømi yvir hinum mektigu.

14 Út úr Ē´-phră-īm *var* ein rót av teimum ímóti Ā´-mâ-lĕk; eftir tær, Benjamin, millum fólk títt; út úr Má´-chīr komu oman landsstjórar, og út úr Zē´-bŭ-lŏn teir sum handfara skrivarans penn.

15 Og prinsarnir av Ĭs´-să-chār *vóru* við Dē´-bôr-ŭh; enntá Ĭs´-să-chār, og eisini Bâr´-ăk: hann varð sendur til fóts inn í dalin. Fyri deildir Reûbens *vóru* miklar hjarta-hugsanir.

16 Hví varðst tú *verandi* seyðabyrgjanna millum, at hoyra fylgjanna jarman? Fyri deildirnar av Reûbeni *vóru* miklar hjarta-rannsakanir.

17 Gilead varð *verandi* handan Jordan: og hví varð Dán verandi í skipum? Ásjer helt áfram á sævarstrondini, og varð *verandi* í sínum víkum.

18 Zē´-bŭ-lŏn og Năph´-tâ-lī *vóru* eitt fólk, *sum* váðasettu síni lív at deyðanum á vallarins høgu plássum.

19 Kongarnir komu *og* bardust, tá bardust kongarnir av Cānaan í Tā´-ă-năch við vøtnini av Mĕ-gĭd´-dō; teir tóku ongan vinning av peningi.

20 Teir bardust frá himni; stjørnurnar í sínum kósum bardust ímóti Sī´-sĕ-ră.

21 Kī´-sjŏn-s á streyk teir burtur, handa elligamla áin, áin Kī´-sjŏn. O mín sál, tú hevurt troðið niður styrki.

22 Tá vórðu hests-hógvarnir brotnir við brúki av tvísporingunum, tvísporingunum hjá hinum mektigu teirra.

23 Bannið tit Mĕ´-rŏz, segði eingil HARRANS, bannið tit beiskligani íbúgvar tess; av tí at teir komu ikki til hjálpar hjá HARRANUM, til hjálpar hjá HARRANUM ímóti hinum mektigu.

24 Vælsignað uppum kvinnur skal Jā´-ĕl, ektakona Hĕ´-bĕr-s Kē-nĭt´-a, vera, vælsignað skal hon vera uppum kvinnur í tjaldinum.

25 Hann bað *um* vatn, *og* hon gav *honum* mjólk; hon bar fram smjør í eini harraligari skál.
26 Hon setti sína hond til naglan, og sína høgru hond til verkamansins hamara; og við hamaranum sló hon Sĭ´-sĕ-ră, hon sló av høvur hans, tá ið hon hevði gatað og sligið ígjøgnum tynningar hans.
27 Við hennara føtur hann boygdist, hann fell, hann legðist niður: við hennara føtur hann boygdist, hann fell: har *sum* hann boygdist, har datt hann niður deyður.
28 Móðir Sĭ´-sĕ-ră hugdi út um ein glugga, og ópti ígjøgnum rimaverkið, Hví er hansara vagnur *so* leingi um at koma? hví bíða hjólini av hansara vagnum?
29 Hennara vísu frýr svaraðu henni, ja, hon vendi aftur svar til sín sjálvs,
30 Hevur teimum ikki byrast? hava teir *ikki* deilt herfongin; til hvønn mann eina gentu *ella* tvær; til Sĭ´-sĕ-ră ein ymsa-lita herfong, ein ymsa-lita herfong av nálarbeiði, av ymsa-lita nálararbeiði á báðum síðum, *hóskiligt* til hálsarnar á *teimum sum taka* fongin?
31 So lat allar tínar fíggindar farast, O HARRI: men *lat* teir, sum elska hann, *vera* sum sólin, tá ið hann gongur fram í megi síni. Og landið hevði hvílu fjøruti ár.

KAPITUL 6

OG Ísraels børn gjørdu ilt í eygsjón HARRANS: og HARRIN flýggjaði teir inn í hondina á Mĭ´-dī-ăn sjey ár.
2 Og hond Mĭ´-dī-ăn-s *hevði* yvirvág ímóti Ísrael: *og* uppá grund av Mī-dī-ă-nĭt´-unum gjørdu Ísraels børn sær holurnar sum *eru* í fjøllunum, og hellir, og vígvirkir.
3 Og *soleiðis* varð tað, tá ið Ísrael hevði sáað, at Mī-dī-ă-nĭt´-arnir komu upp, og Â-măl-ĕk-ĭt´-arnir, og børnini úr eystri, enntá teir komu upp ímóti teimum;
4 Og teir leiraðust ímóti teimum, og oyðiløgdu grøði jarðarinnar, til tú komi at Gă´-zā, og eftirlótu einkið *lívs*uppihald til Ísrael, hvørki seyð, ella oksa, ella asna.
5 Tí at teir komu upp við fenaði sínum og tjøldum sínum, og teir komu sum grashoppur í fjøldleika; *tí at* bæði teir og teirra kamelar vóru uttan tal: og teir innfóru inn í landið til at oyðileggja tað.
6 Og Ísrael var stórligani útarmað uppá grund av Mī-dī-ă-nĭt´-unum; og Ísraels børn róptu á HARRAN.
7 ¶ Og tað bar á, tá ið Ísraels børn róptu á HARRAN uppá grund av Mī-dī-ă-nĭt´-unum,
8 At HARRIN sendi ein prophet at Ísraels børnum, sum segði við teir, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Eg førdi tykkum upp frá Egyptalandi, og førdi tykkum fram út úr trældóms-húsinum;
9 Og eg útfríaði tykkum út úr hondini á Egyptunum, og út úr hondini á øllum sum kúgaðu tykkum, og rak teir út frammi fyri tykkum ífrá, og gav tykkum land teirra;
10 Og eg segði við tykkum, Eg *eri* HARRIN Guð tykkara; óttist ikki gudarnar hjá Amoritunum, í hvørs landi tit dvøljast: men tit hava ikki lýtt mína rødd.
11 ¶ Og tað kom ein eingil HARRANS, og sat undir eini eik, sum *var* í Ōph´-răh, sum *tilhoyrdi* Jó´-ăsj Â-bĭ-ĕz-rĭt´-a: og sonur hansara Gideon treskti hveiti við vínpersuna, til at fjala *tað* fyri Mī-dī-ă-nĭt´-unum.
12 Og eingil HARRANS birtist honum, og segði við hann, HARRIN *er* við tær, tú mektigi reystsemis maður.

13 Og Gideon segði við hann, Á, Harri mín, um HARRIN veri við okkum, hví hevur tá alt hetta viðurfarið okkum? og hvar *veri* allar hans undurgerðir, sum várir fedrar søgdu okkum um, sigandi, Førdi ikki HARRIN okkum upp frá Egyptalandi? men nú hevur HARRIN yvirgivið okkum, og flýggjað okkum inn í hendur Mī-dī-ă-nīt′-anna.

14 Og HARRIN hugdi uppá hann, og segði, Far í hesum mátti tínum, og tú skalt frelsa Ísrael frá hondini á Mī-dī-ă-nīt′-unum: havi ikki eg sent teg?

15 Og hann segði við hann, Á, Harri mín, hvarvið skal eg frelsa Ísrael? sí, mín familja *er* fátæk í Mă-năs′-sĕh, og eg *eri* hin minsti í húsi faðirs míns.

16 Og HARRIN segði við hann, Vissuliga, eg vil vera við tær, og tú skalt sláa Mī-dī-ă-nīt′-arnar sum ēin mann.

17 Og hann segði við hann, Um nú eg havi funnið náði í eygsjón tíni, tá sýn mær eitt tekin, at tú talart við meg.

18 Vík ikki hiðani, eg biði teg, inntil eg komi at tær, og føri fram mína gávu, og seti *hana* frammi fyri tær. Og hann segði, Eg vil bíða, inntil tú komi aftur.

19 ¶ Og Gideon fór inn, og gjørdi tilreiðar eitt geitarlamb, og ósúrgaðar køkur av eini ē′-phŭh av mjøli: kjøtið koyrdi hann í eina tægu, og hann koyrdi súpanina í eina krukku, og førdi *tað* út at honum undir eikina, og framsetti *tað*.

20 Og eingil Guðs segði við hann, Tak kjøtið og tær ósúrgaðu køkurnar, og legg *tey* uppá henda klett, og hell út súpanina. Og hann so gjørdi.

21 ¶ Tá setti eingil HARRANS fram endan á stavinum, sum *var* í hond hansara, og nam við kjøtið og tær ósúrgaðu køkurnar; og tað reis upp eldur út úr klettinum, og upptærdi kjøtið og tær ósúrgaðu køkurnar. Tá fór eingil HARRANS avstað út úr eygsjón hansara.

22 Og tá ið Gideon varnaðist, at hann *var* ein eingil HARRANS, segði Gideon, Akk, O Harri GUÐ! tí av tí at eg havi sæð ein eingil HARRANS andlit til andlits.

23 Og HARRIN segði við hann, Friður *veri* at tær; óttast ikki: tú skalt ikki doyggja.

24 Tá bygdi Gideon eitt altar har at HARRANUM, og kallaði tað Jĕ-hō′-văh-sjā′-lōm: at hesum degi *er* tað enn í Ōph′-răh Â-bī-ĕz-rīt′-anna.

25 ¶ Og tað bar á hina somu nátt, at HARRIN segði við hann, Tak faðirs tíns unga ungtarv, enntá annan ungtarvin á sjey ára aldri, og kasta niður altar Bā′-ăl-s sum faðir tín hevur, og høgg niður lundina sum *er* hjá tí:

26 Og bygg eitt altar at HARRANUM Guði tínum uppiá toppinum av hesum klettinum, í tí fyriskipaða plássinum, og tak hin annan ungtarvin, og ofra eitt brennioffur við viðinum av lundini, sum tú skalt høgga niður.

27 Tá tók Gideon tíggju menn av tænarum sínum, og gjørdi eins og HARRIN hevði sagt við hann: og *soleiðis* varð tað, av tí at hann óttaðist húshald faðirs síns, og menn staðarins, at hann kundi ikki gera *tað* um dag*in,* at hann gjørdi *tað* um nátt*ina*.

28 ¶ Og tá ið menninir av staðinum reistust árla um morgunin, sí, altar Bā′-ăl-s var kastað niður, og lundin var høgd niður, sum *var* hjá tí, og hin annar ungtarvurin var ofraður uppiá altarinum, *sum var* bygt.

29 Og teir søgdu hvør til annan, Hvør hevur gjørt henda lut? Og tá ið teir fregnaðust og spurdu, søgdu teir, Gideon Jó′-ăsj sonur hevur gjørt henda lut.

30 Tá søgdu menninir av staðinum við Jó´ăsj, Før út son tín, at hann má doyggja: av tí at hann hevur kastað niður altar Bă´ăl-s, og av tí at hann hevur høgt niður lundina, sum *var* hjá tí.

31 Og Jó´ăsj segði við allar sum stóðu ímóti honum, Vilja tit bøna fyri Bă´ăl? vilja tit bjarga honum? hann, sum vil bøna fyri hann, lat hann verða tiknan av lívi, meðan *tað er enn* morgun: um hann *veri* ein gudur, lat hann bøna fyri seg sjálvan, av tí at *ēin* hevur kastað niður altar hansara.

32 Tessvegna á tí degi kallaði hann hann Jĕr-ŭb-bă´ăl, sigandi, lat Bă´ăl bøna ímóti honum, av tí at hann hevur kastað niður altar hansara.

33 ¶ Tá vórðu allir Mī-dī-ă-nīt´-arnir og Â-măl-ĕk-īt´-arnir og børnini úr eystri savnaðir saman, og fóru yvirum, og slógu upp í dali Jĕz´-rēĕl-s.

34 Men Andi HARRANS kom uppá Gideon, og hann blásti ein lúður; og Ă-bī-ē´-zĕr var savnaður eftir honum.

35 Og hann sendi sendiboðar út gjøgnum allan Mă-năs´-sĕh; hvør eisini var savnaður eftir honum: og hann sendi sendiboðar at Ásjer, og at Zē´-bŭ-lŏn, og at Năph´-tâ-lī; og teir komu upp at møta teimum.

36 ¶ Og Gideon segði við Guð, Um tú vilt frelsa Ísrael við^ hond míni, eins og tú hevurt sagt,

37 Sí, eg vil seta eitt ullarskinn á gólvið; *og* um døggin verði á skinninum einans, og *tað verði* turt uppiá allari jørðini *við síðuna av,* tá skal eg vita, at tú vilt frelsa Ísrael við^ hond míni, eins og tú hevurt sagt.

38 Og tað varð so: tí hann reis upp snimma um morgisárið, og rendi skinnið saman, og vant døggina úr skinninum, eina skál fulla av vatni.

39 Og Gideon segði við Guð, Lat ei tína firtni verða heita ímóti mær, og eg vil tala bert hesa ēinu ferðina: lat meg royna, eg biði teg, bert hesa ēinu ferðina við skinninum; lat tað nú vera turt einans uppiá skinninum, og uppiá øllum lendinum lat tað vera døgg.

40 Og Guð so gjørdi ta náttina: tí at tað var turt uppiá skinninum einans, og tað var døgg á øllum lendinum.

KAPITUL 7

TÁ risu Jĕr-ŭb-bă´ăl, hvør *er* Gideon, og alt fólkið sum við honum *vóru,* upp árla, og slógu upp við síðuna av brunni Hâr´-ŏd-s: so at herliðið hjá Mī-dī-ă-nīt´-unum vóru á norður síðuni av teimum, við Mō´-rĕh heyggj, í dalinum.

2 Og HARRIN segði við Gideon, Fólkini, sum *eru* við tær, *eru* ov mangir hjá mær til at geva Mī-dī-ă-nīt´-arnar inn í hendur teirra, at ikki Ísrael breggi sær ímóti mær, sigandi, Mín egna hond hevur frelst meg.

3 Nú tessvegna, kom nú, kunnger í oyruni á fólkinum, sigandi, Hvørsumhelst *ið er* óttafullur og ræddur, lat hann venda aftur og fara avstað snimma frá Gilead fjalli. Og tað vendu aftur av fólkinum tjúgu og tvey túsund; og tað vórðu verandi tíggju túsund.

4 Og HARRIN segði við Gideon, Fólkið *eru* enn *ov* mangir; før teir oman at vatninum, og eg vil royna teir fyri teg har: og tað skal verða, *at* um hvønn eg sigi við teg, Hesin skal fara við tær, hin sami skal fara við tær; og um hvønnsumhelst *ið* eg sigi við teg, Hesin skal ikki fara við tær, hin sami skal ikki fara.

5 So hann førdi oman fólkið at vatninum: og HARRIN segði við Gideon, Hvør tann sum leppur

av vatninum við tungu síni, eins og ein hundur leppur, hann skalt tú seta fyri seg sjálvan; somuleiðis hvønn tann sum boyggir *seg* niður uppá síni knø til at drekka.

6 Og talið á teimum sum leptu, *setandi* sína hond til sín munn, vóru trý hundrað menn: men øll restin av fólkinum boygdu *seg* niður uppá síni knø til at drekka vatn.

7 Og HARRIN segði við Gideon, Við^ teimum trý hundrað monnunum, sum leptu, vil eg frelsa tykkum, og flýggja Mī-dī-ă-nīt´-arnar inn í hond tína: og lat alt *hītt* fólkið fara hvør maður at plássi sínum.

8 So fólkið tók vistir í hond sína, og lúðrar sínar: og hann sendi alla *restina av* Ísrael hvønn mann at tjaldi sínum, og afturhelt teir trý hundrað menninar: og Mī´-dī-ăn-s herlið var niðanfyri hann í dalinum.

9 ¶ Og tað bar á hina somu nátt, at HARRIN segði við hann, Reis *teg,* slepp tær oman at herliðinum; tí at eg havi flýggjað tað inn í hond tína.

10 Men um tú óttist at fara oman, far tú við Phū´-răh, tænara tínum, oman til herliðið:

11 Og tú skalt hoyra hvat teir siga; og síðan skulu tínar hendur verða styrktar til at fara oman at herliðinum. Tá fór hann oman við Phū´-răh, tænara sínum, at útsíðuni av teimum herbúnu monnunum, sum *vóru* í herliðinum.

12 Og Mī-dī-ă-nīt´-arnir og Â-măl-ĕk-īt´-arnir og øll børnini úr eystri lógu yvireftir í dalinum líka *sum* grashoppur í fjøldleika; og kamelarnir hjá teimum *vóru* uttan tal, sum sandurin við sævarstrondina í fjøldleika.

13 Og tá ið Gideon var komin, sí, *har var* ein maður sum segði frá einum dreymi yvirfyri felaga sínum, og segði, Sí, meg droymdi ein dreym, og sí, ein køka av byggbreyði bóltaði inn í herliðið hjá Mī´-dī-ăn, og kom at einum tjaldi, og sló tað, *so* at tað fell, og umvelti tað, *so* at tjaldið lá yvireftir.

14 Og hansara felagi svaraði og segði, Hetta *er* einkið annað enn svørðið hjá Gideon Jó´-ăsj syni, einum manni av Ísrael: *tí* inn í hansara hond hevur Guð flýggjað Mī´-dī-ăn, og alt herliðið.

15 ¶ Og tað varð *soleiðis,* tá ið Gideon hoyrdi frásigingina av dreyminum, og týðingina harav, at hann tilbað, og vendi aftur at herliði Ísraels, og segði, Reisist; tí at HARRIN hevur flýggjað inn í hond tykkara Mī´-dī-ăns herlið.

16 Og hann deildi teir trý hundrað menninar *í* trý samløg, og hann koyrdi ein lúður í hvørs mans hond, við tómum krukkum, og lompum inni í krukkunum.

17 Og hann segði við teir, Hyggið á meg, og gerið líkaleiðis: og sí, tá ið eg komi til útsíðuna av leirinum, skal tað verða, *at* eins og eg geri, soleiðis skulu tit gera.

18 Tá ið eg blási við lúðrinum, eg og allir sum við mær *eru,* tá blásið tit lúðrarnar eisini á hvørjari síðu av øllum leirinum, og sigið, *Svørð* HARRANS, og Gideons.

19 ¶ So Gideon, og teir hundrað menninir sum við honum *vóru,* komu at útsíðuni á leirinum í byrjanini av tí mittastu vøkuni; og teir høvdu bert nýligani sett vaktina: og teir blástu lúðrarnar, og brutu krukkurnar sum *vóru* í hondum teirra.

20 Og teir tríggir flokkarnir blástu lúðrarnar, og brutu krukkurnar, og hildu lampurnar í sínum vinstru hondum, og lúðrarnar í sínum høgru hondum til at blása *við:* og teir róptu, Svørð HARRANS, og Gideons.

21 Og teir stóðu hvør maður í

sínum plássi rundan um leirin: og alt herliðið rann, og geylaði, og flýddi.

22 Og teir trý hundrað blástu lúðrarnar, og HARRIN setti hvørs mans svørð ímóti felaga hans, enntá út gjøgnum alt herliðið: og herliðið flýddi til Bĕth-sjĭt´-tăh í Zĕr´-ĕ-răth, *og* til markið hjá Á-bĕl-mĕ-hó´-lăh, at Tăb´-băth.

23 Og menninir av Ísrael savnaðu seg saman úr Năph´-tâ-lī, og úr Ásjer, og úr øllum Mă-năs´-sĕh, og eltu eftir Mī-dī-ă-nīt´-unum.

24 ¶ Og Gideon sendi sendiboðar út gjøgnum alt Ē´-phră-īm fjall, sigandi, Komið niður ímóti Mī-dī-ă-nīt´-unum, og takið frammi fyri teimum vøtnini til Bĕth-bâr´-ăh og Jordan. Tá savnaðu allir menninir av Ē´-phră-īm seg saman, og tóku vøtnini til Bĕth-bâr´-ăh og Jordan.

25 Og teir tóku tveir prinsar hjá Mī-dī-ă-nīt´-unum, Ór´-ĕb og Zēēb; og teir vógu Ór´-ĕb uppiá klettinum Ór´-ĕb, og Zēēb vógu teir við vínpersu Zēēbs, og eltu Mī´-dī-ăn, og komu við høvdunum hjá Ór´-ĕb og Zēēb til Gideons hĭnumegin Jordan.

KAPITUL 8

OG menninir av Ē´-phră-īm søgdu við hann, Hví hevurt tú tænt okkum soleiðis, at tú kallaðirt okkum ikki, tá ið tú fórt at berjast við Mī-dī-ă-nīt´-arnar? Og teir skeldaðu við hann hvassliga.

2 Og hann segði við teir, Hvat havi eg gjørt nú í samanburði við tykkum? *Er* ikki fínhentingin av vínberjum Ē´-phră-ĭm-s betri enn víngarður Ă-bĭ-ē´-zĕr-s?

3 Guð hevur flýggjað inn í tykkara hendur prinsarnar av Mī´-dī-ăn, Ór´-ĕb og Zēēb: og hvat var eg førur fyri at gera í samanburði við tykkum? Tá varð teirra firtni lækkað ímóti honum, tá ið hann hevði sagt tað.

4 ¶ Og Gideon kom til Jordan, *og* fór yvirum, hann, og teir trý hundrað menninir sum við honum *vóru,* ørmaktaðir, tó eltandi *teir.*

5 Og hann segði við menninar av Sŭc´-cōth, Gevið, eg biði tykkum, fólkinum heilbreyð, sum fylgja mær; tí at teir *eri* ørmaktaðir, og eg elti eftir Zē´-bâh og Zăl-mŭn´-nă, kongum av Mī´-dī-ăn.

6 ¶ Og prinsarnir av Sŭc´-cōth søgdu, *Eru* hendurnar á Zē´-bâh og Zăl-mŭn´-nă nú í tíni hond, at vit skuldu givið breyð innat heri tínum?

7 Og Gideon segði, Tessvegna, tá ið HARRIN hevur flýggjað Zē´-bâh og Zăl-mŭn´-nă inn í hond mína, tá vil eg ríva kjøt tykkara við tornunum úr oyðuni og við tistlum.

8 ¶ Og hann fór niðan haðani til Pĕn´-ū-ĕl, og talaði við teir líkaleiðis: og menninir av Pĕn´-ū-ĕl svaraðu honum eins og menninir av Sŭc´-cōth høvdu svarað *honum.*

9 Og hann talaði eisini við menninar av Pĕn´-ū-ĕl, sigandi, Tá ið eg komi aftur í friði, vil eg bróta niður hetta torn.

10 ¶ Nú, Zē´-bâh og Zăl-mŭn´-nă *vóru* í Kâr´-kôr, og herliðini hjá teimum við teimum, umleið fimtan túsund *menn,* allir sum vóru eftir av øllum herliðunum hjá børnum eystursins: tí at tað fullu eitt hundrað og tjúgu túsund menn sum drógu svørð.

11 ¶ Og Gideon fór niðan eftir vegi teirra sum dvaldust í tjøldum eystanfyri Nō´-băh og Jōg´-bĕhâh, og sló herliðið: tí at herliðið var trygt.

12 Og tá ið Zē´-bâh og Zăl-mŭn´-nă flýddu, elti hann eftir teimum, og tók teir tveir kongarnar av Mī´-dī-ăn, Zē´-bâh og Zăl-mŭn´-nă, og avhólvaði alt herliðið.

13 ¶ Og Gideon Jó´-ăsj sonur vendi aftur frá bardaga áðrenn sólin *var uppi,*

14 Og fangaði ein ungan mann
av monnum Sŭc′-cōth-s, og fregn-
aði av honum: og hann skrivaði
honum upp prinsarnar av Sŭc′-
cōth, og hinar elstu tess, *enntá*
trísinstjúgu og seytjan menn.
15 Og hann kom at monn-
unum av Sŭc′-cōth, og segði, Sí
Zē′-bâh og Zăl-mŭn′-nă, við hvørj-
um tit niðurgjørdu meg, sigandi,
Eru hendurnar á Zē′-bâh og Zăl-
mŭn′-nă nú í hond tíni, at vit
skuldu givið breyð innat monn-
um tínum *sum eru* móðir?
16 Og hann tók hinar elstu av
staðinum, og tornir úr oyðuni og
tistlar, og við teimum lærdi hann
menninar av Sŭc′-cōth.
17 Og hann bardi niður Pĕn′-ū-
ĕl-s torn, og vó menninar av stað-
inum.
18 ¶ Tá segði hann við Zē′-bâh
og Zăl-mŭn′-nă, Hvørsháttar menn
vóru teir sum tit vógu í Tā′-bôr?
Og teir svaraðu, Eins og tú *ert,* so-
leiðis *vóru* teir; hvør *og* ēin líknaði
børnunum hjá einum kongi.
19 Og hann segði, Teir *vóru*
brøður mínir, *enntá* synir móður
mínar: *sum* HARRIN livir, um tit
høvdu bjargað teimum á lívi, vildi
eg ikki vigið tykkum.
20 Og hann segði við Jē′-thĕr,
frumborna sín, Upp, *og* veg teir.
Men unglingin dró ikki svørð sítt:
tí at hann óttaðist, av tí at hann
var enn ein unglingi.
21 Tá søgdu Zē′-bâh og Zăl-
mŭn′-nă, Rís tú, og fall uppá
okkum: tí at eins og maðurin *er,*
soleiðis er styrki hansara. Og
Gideon reistist, og vó Zē′-bâh og
Zăl-mŭn′-nă, og tók burtur prýðis-
lutirnar sum *vóru* á hálsunum á
kamelum teirra.
22 ¶ Tá søgdu menninir av
Ísrael við Gideon, Rík tú yvir
okkum, bæði tú, og sonur tín, og
sonarsonur tín eisini: tí at tú
hevurt útfríað okkum frá Mī′-dī-
ăn-s hond.
23 Og Gideon segði við teir, Eg
vil ikki ríkja yvir tykkum, eiheldur
skal sonur mín ríkja yvir tykkum:
HARRIN skal ríkja yvir tykkum.
24 ¶ Og Gideon segði við teir,
Eg vildi tráað eina umbøn av tykk-
um, at tit vildu givið mær hvør
maður oyrnaringarnar av sínum
herfongi. (Tí at teir høvdu gyltar
oyrnaringar, av tí at teir *vóru* Ísj-
mā-ē-lĭt′-ar.)
25 Og teir svaraðu, Vit vilja vilj-
ugliga geva *teir.* Og teir breiddu
eitt klæði, og kastaðu hará hvør
maður oyrnaringarnar av sínum
herfongi.
26 Og vektin á gyltu oyrnaring-
unum, sum hann umbað, var eitt
túsund og sjey hundrað *sjē′-kl-ar*
av gulli; umframt prýðislutir, og
hálsbond, og purpur klædnaður
sum *var* á kongunum av Mī′-dī-ăn,
og umframt keturnar sum *vóru*
um hálsarnar á kamelum teirra.
27 Og Gideon gjørdi eina ê-
phōd′-u harúr, og setti hana í stað
sín, *enntá* í Ōph′-răh: og allur Ís-
rael fór hagar horandi eftir henni:
hvør lutur gjørdist ein snerra at
Gideoni, og fyri húsi hans.
28 ¶ Svá varð Mī′-dī-ăn undir-
lagt frammi fyri børnum Ísraels,
so at teir lyftu upp høvdum sín-
um ei meira. Og landið var í stilli
fjøruti ár á døgum Gideons.
29 ¶ Og Jĕr-ŭb-bā′-ăl Jó′-ăsj
sonur fór og dvaldist í egna húsi
sínum.
30 Og Gideon hevði trísins-
tjúgu og tíggju synir likams síns
gitnar: tí at hann hevði mangar
ektakonur.
31 Og hansara medkona, sum
var í Sjē′-chĕm, hon eisini føddi
honum ein son, hvørs navn hann
kallaði Â-bī′-mê-lĕch.
32 ¶ Og Gideon, sonur Jó′-ăsj-
ar, doyði í einum góðum gomlum
aldri, og varð jarðaður í gravhýsi
Jó′-ăsj-ar, faðirs síns, í Ōph′-răh Â-
bĭ-ĕz-rīt′-anna.

33 Og tað bar á, so skjótt sum Gideon var deyður, at Ísraels børn snúðu aftur, og fóru horandi eftir Bá´-ăl-ím, og gjørdu Bá´-ăl-bē´-rĭth *til* gud sín.

34 Og Ísraels børn mintust ikki HARRAN Guð sín, sum hevði útfrían teir út úr hondunum á øllum teirra fíggindum á hvørjari síðu:

35 Eiheldur sýndu teir blídni mót húsi Jĕr-ŭb-bá´-ăl-s, *nevniliga,* Gideons, samsvarandi við alla ta góðsemi sum hann hevði sýnt at Ísrael.

KAPITUL 9

OG Â-bī´-mê-lĕch Jĕr-ŭb-bá´-ăl-s sonur fór til Sjē´-chĕm at sínum móðurbrøðrum, og samtalaði við teir, og við alla familjuna av húsi móðurfaðirs síns, sigandi,

2 Talið, eg biði tykkum, í oyruni á øllum monnunum av Sjē´-chĕm, Hvørt *er* betri hjá tykkum, antin at allir synirnir hjá Jĕr-ŭb-bá´-ăl-i, *sum eru* trísinstjúgu og tíggju persónar, ríki yvir tykkum, ella at ein ríki yvir tykkum? minnist eisini, at eg *eri* bein tykkara og kjøt tykkara.

3 Og hansara móðurbrøður talaðu um hann í oyruni á øllum monnunum av Sjē´-chĕm øll hesi orðini: og teirra hjørtu bendust til at fylgja Â-bī´-mê-lĕch-i; tí at teir søgdu, Hann *er* bróðir okkara.

4 Og teir góvu honum trísinstjúgu og tíggju *stykkir* av silvuri út úr húsi Bá´-ăl-bē´-rĭth-s, hvarvið Â-bī´-mê-lĕch leigaði fáfongdar og lætt*isligar* persónar, sum fylgdu honum.

5 Og hann fór at húsi faðirs síns í Ŏph´-răh, og vó bróður sínar, synir Jĕr-ŭb-bá´-ăl-s, *verandi* trísinstjúgu og tíggju persónar, uppiá ĕinum steini: hóast hetta, tó var Jó´-thăm, yngsti sonur Jĕr-ŭb-bá´-ăl-s, eftir; tí at hann fjaldi seg.

6 Og allir menninir av Sjē´-chĕm savnaðu *seg* saman, og alt hús Mĭl´-lō-s, og fóru, og gjørdu Â-bī´-mê-lĕch *til* kong, við slættan av súluni sum *var* í Sjē´-chĕm.

7 ¶ Og tá ið teir søgdu *tað* fyri Jó´-thăm-i, fór hann og stóð á toppinum av Gĕ-rī´-zīm fjalli, og lyfti upp rødd síni, og geylaði, og segði við teir, Lýðið á meg, tit menn av Sjē´-chĕm, at Guð má lýða á tykkum.

8 Trøini fóru fram *eina ferðina* at salva ein kong yvir sær; og tey søgdu við olivintræið, Rík tú yvir okkum.

9 Men olivintræið segði við tey, Skuldi eg farið frá mínum fiti, við hvørjum, viðˆ mær, teir æra Guð og mann, og farið at verðið framflutt yvir trøini?

10 Og trøini søgdu við fikutræið, Kom tú, *og* rík yvir okkum.

11 Men fikutræið segði við tey, Skuldi eg yvirgivið mína søtsemi, og mín góða ávøkst, og farið at verðið framflutt yvir trøini?

12 Tá søgdu trøini við víntræið, Kom tú, *og* rík yvir okkum.

13 Og víntræið segði við tey, Skuldi eg farið frá mínum víni, sum kætir Guð og mann, og farið at verðið framflutt yvir trøini?

14 Tá søgdu øll trøini við rossaberjarunnin, Kom tú, *og* rík yvir okkum.

15 Og rossaberjarunnurin segði við trøini, Um í sannleika tit salvi meg *til* kong yvir tykkum, *tá* komið *og* setið tykkara álit á skugga mín: og um ikki, lat eld koma út úr rossaberjarunninum, og upptæra sedris*trø* Lī´-bă-nŏn-s.

16 Nú tessvegna, um tit havi gjørt sannliga og ærliga, í at tit hava gjørt Â-bī´-mê-lĕch *til* kong, og um tit havi farið væl við Jĕr-ŭb-bá´-ăl-i og húsi hansara, og havi gjørt innat honum samsvarandi við uppiburð handa hans;

17 (Tí at faðir mín bardist fyri tykkum, og váðasetti lív sítt fjart,

og útfríaði tykkum út úr hondini á Mī´-dī-ăn:

18 Og tit eru risnir upp ímóti faðirs míns húsi henda dag, og hava vigið synir hansara, trísinstjúgu og tíggju persónar, uppiá einum steini, og hava gjørt Â-bī´-mê-lĕch, sonin hjá tænastugentu hansara, *til* kong yvir monnunum av Sjē´-chĕm, av tí at hann *er* bróðir tykkara;)

19 Um tit tá havi farið sannliga og ærliga við Jĕr-ŭb-bā´-ăl-i og við húsi hansara henda dag, *tá* fegnist tit í Â-bī´-mê-lĕch-i, og lat hann eisini fegnast í tykkum:

20 Men um ikki, lat eld koma út frá Â-bī´-mê-lĕch-i, og upptæra menninar av Sjē´-chĕm, og Mĭl´-lō-s hús; og lat eld koma út frá monnunum av Sjē´-chĕm, og frá Mĭl´-lō-s húsi, og upptæra Â-bī´-mê-lĕch.

21 Og Jó´-thăm rann avstað, og flýddi, og fór til Bēēr, og dvaldist har, av ótta fyri Â-bī´-mê-lĕch-i, bróður sínum.

22 ¶ Tá ið Â-bī´-mê-lĕch hevði ríkt trý ár yvir Ísrael,

23 Tá sendi Guð ein illan anda ímillum Â-bī´-mê-lĕch og menninar av Sjē´-chĕm; og menninir av Sjē´-chĕm fóru svikaligani við Â-bī´-mê-lĕch-i:

24 At grimdin, *gjørd* við teir trísinstjúgu og tíggju synirnar hjá Jĕr-ŭb-bā´-ăl-i, mátti koma, og teirra blóð verða lagt uppá Â-bī´-mê-lĕch teirra bróður, sum vó teir; og uppá menninar av Sjē´-chĕm, sum dugnaðu honum í drepingini av brøðrum hansara.

25 Og menninir av Sjē´-chĕm settu liggjarar á lúri eftir honum á toppin av fjøllunum, og teir rændu allar sum komu yvireftir tann vegin um teir: og tað varð sagt Â-bī´-mê-lĕch-i.

26 Og Gá´-ăl, sonur Ē´-bĕd-s, kom við brøðrum sínum, og fór yvir til Sjē´-chĕm: og menninir av Sjē´-chĕm settu sítt álit á hann.

27 Og teir fóru út á akrarnar, og savnaðu sínar víngarðar, og tróðu *vindrúvurnar,* og hildu *sær* at gamni, og fóru inn í hús guds síns, og ótu og drukku, og bannaðu Â-bī´-mê-lĕch.

28 Og Gá´-ăl, sonur Ē´-bĕd-s, segði, Hvør *er* Â-bī´-mê-lĕch, og hvør *er* Sjē´-chĕm, at vit skuldu tænt honum? *er* ikki *hann* sonur Jĕr-ŭb-bā´-ăl-s? og Zē´-bŭl yvirmaður hansara? tænið monnunum hjá Há´-mōr-i, faðir Sjē´-chĕm-s: tí at hví skuldu vit tænt honum?

29 Og gævi Guð hetta fólk var undir hond míni! tá vildi eg burtflutt Â-bī´-mê-lĕch. Og hann segði við Â-bī´-mê-lĕch, Øk her tín, og kom út.

30 ¶ Og tá ið Zē´-bŭl, stjórnari staðarins, hoyrdi orðini hjá Gá´-ăl Ē´-bĕd-s syni, varð hansara firtni kynd.

31 Og hann sendi sendiboðar at Â-bī´-mê-lĕch-i loyniliga, sigandi, Sí, Gá´-ăl Ē´-bĕd-s sonur og brøður hansara veri komnir til Sjē´-chĕm; og sí, teir vígvirkja staðin ímóti tær.

32 Nú tessvegna, upp um nátt*ina,* tú og fólkið sum við tær *er,* og ligg á lúri í akrinum:

33 Og tað skal verða, *at* um morgunin, so skjótt sum sólin er uppi, skalt tú rísa árla, og ráðast á staðin: og sí, *tá ið* hann, og fólkið sum *er* við honum, koma út ímóti tær, tá kanst tú gera við teir eins og tú skalt finna høvi *til.*

34 ¶ Og Â-bī´-mê-lĕch reis upp, og alt fólkið sum við honum *vóru,* um nátt*ina,* og teir lógu *á* lúri ímóti Sjē´-chĕm í fýra flokkum.

35 Og Gá´-ăl Ē´-bĕd-s sonur fór út, og stóð í inngongdini av staðarportrinum: og Â-bī´-mê-lĕch reis upp, og fólkið sum við honum *vóru,* frá at liggja á lúri.

36 Og tá ið Gá´-ăl sá fólkið, segði hann til Zē´-bŭl-s, Sí, tað koma fólk oman frá toppinum av

fjøllunum. Og Zē´-bŭl segði við hann, Tú sært skuggan av fjøllunum, sum *um tey vóru* menn.

37 Og Gá´-ăl talaði aftur og segði, Siggj, tað koma fólk oman eftir miðjum landinum, og ein annar flokkur kemur frameftir eftir slætta Mē-ŏ´-nĕ-nīm-s.

38 Tá segði Zē´-bŭl við hann, Hvar *er* nú muður tín, við hvørjum tú segðirt, Hvør *er* Â-bī´-mê-lĕch, at vit skuldu tænt honum? *er* ikki hetta fólkið sum tú hevurt vanvirt? far út, eg biði nú, og berst við teir.

39 Og Gá´-ăl fór út frammanfyri monnunum av Sjē´-chĕm, og bardist við Â-bī´-mê-lĕch.

40 Og Â-bī´-mê-lĕch elti hann, og hann flýddi frammanfyri honum, og mangir vórðu kollrendir *og* særdir, *alt* at inngongdini av portrinum.

41 Og Â-bī´-mê-lĕch dvaldist í Ă-rŭ´-măh: og Zē´-bŭl stoytti út Gá´-ăl og brøður hansara, at teir skuldu ikki dvøljast í Sjē´-chĕm.

42 Og tað bar á um morginárið, at fólkið fór út á akurin; og teir søgdu Â-bī´-mê-lĕch-i frá.

43 Og hann tók fólkið, og deildi teir í tríggjar flokkar, og lá *á* lúri í akrinum, og hugdi, og sí, fólkið *vóru* komnir fram út úr staðinum; og hann reis upp ímóti teimum, og sló teir.

44 Og Â-bī´-mê-lĕch, og flokkurin sum *var* við honum, tustu frameftir, og stóðu í inngongdini av staðarportrinum: og *hīnir* tveir flokkarnir runnu uppá alt *fólkið* sum *vóru* í akrunum, og vógu teir.

45 Og Â-bī´-mê-lĕch bardist ímóti staðinum allan tann dagin; og hann tók staðin, og vó fólkið sum harí *var,* og bardi niður staðin, og sáaði hann við salti.

46 ¶ Og tá ið allir menninir av Sjē´-chĕm-s torninum hoyrdu *tað,* fóru teir inn í ein festning av húsi gudsins Bē´-rīth.

47 Og tað varð sagt Â-bī´-mê-lĕch-i, at allir menninir av Sjē´-chĕm-s torninum vóru savnaðir saman.

48 Og Â-bī´-mê-lĕch slapp sær upp til Zăl´-mŏn fjalls, hann og alt fólkið sum við honum *vóru;* og Â-bī´-mê-lĕch tók eina øks í hond sína, og høgdi niður ein bul frá trøunum, og tók hann, og legði *hann* á øksl sína, og segði við fólkið sum við honum *vóru,* Tað, *sum* tit hava sæð meg gera, gerið skjótt, *og* gerið eins og eg *havi gjørt.*

49 Og alt fólkið somuleiðis høgdu niður hvør maður sín bul, og fylgdu Â-bī´-mê-lĕch-i, og settu *teir* til festningin, og settu eld á festningin omanyvir teir; so at allir menninir av Sjē´-chĕm-s torninum doyðu eisini, umleið eitt túsund menn og kvinnur.

50 ¶ Tá fór Â-bī´-mê-lĕch til Thē´-bĕz, og leiraðist ímóti Thē´-bĕz, og tók hann.

51 Men har var eitt sterkt torn innanfyri staðin, og hagar flýddu allir menninir og kvinnurnar, og øll tey úr staðinum, og lokaðu *tað* til sín, og sluppu sær upp til toppin av torninum.

52 Og Â-bī´-mê-lĕch kom at torninum, og bardist ímóti tí, og fór tætt at dyrnum á torninum at brenna tað við eldi.

53 Og ein ávís kvinna kastaði eitt stykki av einum kvarnarsteini uppá høvdið á Â-bī´-mê-lĕch-i, og alt til at bróta skølt hansara.

54 Tá kallaði hann skundisliganí á tann unga mannin, hansara vápnasvein, og segði við hann, Drag svørð títt, og veg meg, at menn ikki sigi um meg, Ein kvinna vá hann. Og hansara ungi maður stoytti hann ígjøgn, og hann doyði.

55 Og tá ið menninir av Ísrael sóu, at Â-bī´-mê-lĕch var deyður, fóru teir avstað, hvør maður at plássi sínum.

56 ¶ Svá rindaði Guð vondskuna hjá Â-bī´-mê-lĕch-i, sum hann gjørdi faðir sínum, í at vega sínar sjeyti brøður:
57 Og alt tað illa hjá monnunum av Sjĕ´-chĕm rindaði Guð omanyvir høvdini á teimum: og omanyvir teir kom bølbønin hjá Jó´-thăm-i Jĕr-ŭb-bā´-ăl-s syni.

KAPITUL 10

OG eftir Â-bī´-mê-lĕch reistist at verja Ísrael Tō´-lă Pŭ´-ăh sonur, Dodo-s sonar, ein maður av Ĭs´-să-chār; og hann dvaldist í Sjá´-mĭr á Ē´-phră-ĭm fjalli.
2 Og hann dømdi Ísrael tjúgu og trý ár, og doyði, og varð jarðaður í Sjá´-mĭr.
3 ¶ Og eftir hann reistist Já´-ĭr, ein Gileaditi, og dømdi Ísrael tjúgu og tvey ár.
4 Og hann hevði tríati synir sum riðu á tríati asnafylum, og teir høvdu tríati staðir sum eru kallaðir Há´-vōth-já´-ĭr at hesum degi, sum *eru* í landi Gileads.
5 Og Já´-ĭr doyði, og varð jarðaður í Cā´-mŏn.
6 ¶ Og børn Ísraels gjørdu ilt aftur í eygsjón HARRANS, og tæntu Bā´-ă-lĭm, og Âsj´-tă-rōth, og gudunum hjá Sýriu, og gudunum hjá Zī´-dŏn, og gudunum hjá Móab, og gudunum hjá Ammons børnum, og gudunum hjá Philistunum, og yvirgóvu HARRAN, og tæntu ikki honum.
7 Og HARRANS firtni varð heit ímóti Ísrael, og hann seldi teir inn í hendurnar á Philistunum, og inn í hendurnar á børnum Ammons.
8 Og tað árið plágaðu og kúgaðu teir Ísraels børn: átjan ár, øll Ísraels børn sum *vóru* hīnumegin Jordan í landi Amoritanna, sum *er* í Gilead.
9 Harafturat fóru Ammons børn yvirum Jordan at berjast eisini ímóti Judah, og ímóti Benjamin, og ímóti húsi Ē´-phră-ĭm-s; so at Ísrael var sára neyðstatt.
10 ¶ Og Ísraels børn róptu á HARRAN, sigandi, Vit hava syndað ímóti tær, bæði av tí at vit hava yvirgivið Guð okkara, og eisini tænt Bā´-ă-lĭm.
11 Og HARRIN segði við børn Ísraels, *Útfríaði* ikki *eg tykkum* frá Egyptunum, og frá Amoritunum, frá børnum Ammons, og frá Philistunum?
12 Zī-dō´-nĭ-ararnir eisini, og Â-măl-ĕk-ĭt´-arnir, og Mâ-ŏn-ĭt´-arnir, kúgaðu tykkum; og tit rópaðu til mín, og eg útfríaði tykkum út úr hond teirra.
13 Tó hava tit yvirgivið meg, og tænt øðrum gudum: hvørsvegna eg vil útfría tykkum ei meira.
14 Farið og rópið á gudarnar sum tit hava valt; lat teir útfría tykkum í tíðini av tykkara trongslu.
15 ¶ Og Ísraels børn søgdu við HARRAN, Vit hava syndað: ger tú at okkum hvatsumhelst *tið* tær tykist gott; útfría okkum einans, vit biðja teg, henda dag.
16 Og teir koyrdu burtur teir fremmandu gudarnar sín ámillum ífrá, og tæntu HARRANUM: og sál hansara varð harmað vegna vesældóm Ísraels.
17 Síðan vórðu Ammons børn savnaðir saman, og leiraðust í Gilead. Og Ísraels børn savnaðu seg saman, og leiraðust í Mĭz´-pēh.
18 Og fólkið *og* prinsarnir av Gilead søgdu hvør til annan, Hvør maður *er hann,* sum vil byrja at berjast ímóti Ammons børnum? hann skal vera høvd yvir øllum íbúgvum Gileads.

KAPITUL 11

NÚ, Jĕph´-thăh Gileaditi var ein mektigur reystleiks maður, og hann *var* sonurin at eini skøkju: og Gilead gat Jĕph´-thăh.
2 Og ektakona Gileads føddi

honum synir; og synirnir hjá ektakonu hansara vuksu upp, og teir stoyttu út Jĕph′-thăh, og søgdu við hann, Tú skalt ikki arva í húsi faðirs okkara; tí at tú *ert* sonurin hjá eini fremmandari kvinnu.

3 Tá flýddi Jĕph′-thăh frá brøðrum sínum, og dvaldist í landi Tóbs: og tað vórðu savnaðir fáfongdir menn til Jĕph′-thăh, og fóru út við honum.

4 ¶ Og tað bar á í framlíðing tíðarinnar, at Ammons børn fórdu kríggj ímóti Ísrael.

5 Og tað varð soleiðis, at tá ið Ammons børn fórdu kríggj ímóti Ísrael, fóru teir elstu av Gilead at heinta Jĕph′-thăh út úr landi Tóbs:

6 Og teir søgdu við Jĕph′-thăh, Kom, og ver høvuðsmaður okkara, at vit mega berjast við børn Ammons.

7 Og Jĕph′-thăh segði við teir elstu av Gilead, Hataðu ikki tit meg, og útróku meg út úr faðirs míns húsi? og hví eru tit komnir at mær nú, tá ið tit eru í neyð?

8 Og teir elstu av Gilead søgdu við Jĕph′-thăh, Tí venda vit aftur til tín nú, at tú mást fara við okkum, og berjast ímóti børnum Ammons, og vera várt høvur yvir øllum íbúgvum Gileads.

9 Og Jĕph′-thăh segði við teir elstu av Gilead, Um tit føri meg heim aftur at berjast ímóti børnum Ammons, og HARRIN flýggi teir frammi fyri mær, skal eg vera høvur tykkara?

10 Og teir elstu av Gilead søgdu við Jĕph′-thăh, HARRIN veri vitni ímillum okkum, um vit geri ikki soleiðis, samsvarandi við orð tíni.

11 Tá fór Jĕph′-thăh við teimum elstu av Gilead, og fólkið gjørdi hann *til* høvd og *til* høvuðsmann yvir sær: og Jĕph′-thăh mælti øll síni orð frammi fyri HARRANUM í Mĭz′-pēh.

12 ¶ Og Jĕph′-thăh sendi sendiboðar at kongi Ammons barna, sigandi, Hvat hevurt tú at gera við meg, at tú ert komin ímóti mær at berjast í landi mínum?

13 Og kongur Ammons barna svaraði sendiboðunum hjá Jĕph′-thăh, Av tí at Ísrael tók burtur land mítt, tá ið teir komu upp út úr Egyptalandi, frá Arnon alt at Jăb′-bŏk, og at Jordan: nú tessvegna, endurbøt tey *londini* aftur friðsamliga.

14 Og Jĕph′-thăh sendi sendiboðar aftur at kongi Ammons barna:

15 Og segði við hann, Svá sigur Jĕph′-thăh, Ísrael tók ikki burtur land Móabs, ella land Ammons barna:

16 Men tá ið Ísrael kom upp frá Egyptalandi, og gekk ígjøgnum oyðuna at Reyða-havinum, og kom til Ká′-dĕsj;

17 Tá sendi Ísrael sendiboðar at kongi Ē′-dóm-s, sigandi, Lat meg, eg biði teg, fara ígjøgnum land títt: men kongur Ē′-dóm-s vildi ikki lýða *hará*. Og á líkan hátt sendu teir at kongi Móabs: men hann vildi ikki *samtykkja:* og Ísrael varð *verandi* í Ká′-dĕsj.

18 Tá fóru teir frameftir ígjøgnum oyðuna, og kringfóru land Ē′-dóm-s, og land Móabs, og komu eftir eyrsíðuni av landi Móabs, og slógu upp hīnumegin Arnon, men komu ikki innum mark Móabs: tí at Arnon *var* mark Móabs.

19 Og Ísrael sendi sendiboðar at Sī′-hŏn, Amorita kongi, Hĕsj′-bŏn-s kongi; og Ísrael segði við hann, Lat okkum fara yvir, vit biðja teg, ígjøgnum land títt inn í pláss mítt.

20 Men Sī′-hŏn leit ikki á Ísrael til at fara ígjøgnum bredda sín: men Sī′-hŏn savnaði alt sítt fólk saman, og sló upp í Já′-hăz, og bardist ímóti Ísrael.

21 Og HARRIN Guð Ísraels flýggjaði Sī´-hŏn og alt fólk hansara inn í hond Ísraels, og teir slógu teir: so Ísrael ognaðist alt landið hjá Amoritunum, íbúgvum tess lands.

22 Og teir ognaðust allar breddarnar hjá Amoritunum, frá Arnon enntá at Jăb´-bŏk, og frá oyðuni enntá at Jordan.

23 So nú hevur HARRIN Guð Ísraels avognað Amoritarnar frammi undan fólki sínum Ísrael, og skuldirt tú ognast tað?

24 Vilt ikki tú ognast tað sum Chĕ´-mōsj, gudur tín, gevur tær at ognast? So hvønnsumhelst *ið* HARRIN Guð okkara skal reka út frammi undan okkum, teir vilja vit ognast.

25 Og nú, *ert* tú nakað ting betri enn Bálak Zĭp´-pôr-s sonur, kongur av Móab? stríddist hann nakrantíð ímóti Ísrael, ella bardist hann nakrantíð ímóti teimum,

26 Meðan Ísrael búði í Hĕsj´-bŏn og hennara býum, og í Á´-rŏ-ĕr og hennara býum, og í øllum staðunum sum *veri seg* yvireftir við breddarnar av Arnon, *í* trý hundrað ár? hví, tessvegna, endurvunnu tit ikki *teir* innanfyri ta tíð?

27 Hvørsvegna eg havi ikki syndað ímóti tær, men tú gert mær órætt *í* at kríggja ímóti mær: HARRIN Dómarin veri dómari henda dag ímillum børn Ísraels og børn Ammons.

28 Hóast hetta, kongurin hjá børnum Ammons lýddi ikki á orðini hjá Jĕph´-thăh, sum hann sendi honum.

29 ¶ Tá kom Andi HARRANS uppá Jĕph´-thăh, og hann fór yvir Gilead, og Mă-năs´-sĕh, og fór yvir Mĭz´-pēh Gileads, og frá Mĭz´-pēh Gileads fór hann yvir *at* børnum Ammons.

30 Og Jĕph´-thăh strongdi eitt heiti at HARRANUM, og segði, Um tú skalt uttan svit flýggja børn Ammons inn í hendur mínar,

31 Tá skal tað verða, at hvatsumhelst *ið* kemur fram úr dyrnum á húsi mínum at møta mær, tá ið eg komi aftur í friði frá børnum Ammons, skal vissuliga vera HARRANS, og eg vil ofra tað upp til eitt brennioffur.

32 ¶ So Jĕph´-thăh fór yvir at børnum Ammons at berjast ímóti teimum; og HARRIN flýggjaði teir inn í hendur hansara.

33 Og hann sló teir frá Á´-rŏ-ĕr, enntá til tú komi til Mĭn´-nĭth, *enntá* tjúgu staðir, og at víngarða slættanum, við eini sera miklari slátran. Svá vórðu børn Ammons undirløgd frammi fyri børnum Ísraels.

34 ¶ Og Jĕph´-thăh kom til Mĭz´-pēh at húsi sínum, og sí, dóttir hansara kom út at møta honum við tamburīnum og við dansum: og hon *var hans* ēinasta barn; umframt hana hevði hann hvørki son ella dóttur.

35 Og tað bar á, tá ið hann sá hana, at hann skræddi klæðir síni, og segði, Akk, dóttir mín! tú hevurt ført meg sera lágt, og tú ert ēin av teimum sum órógva meg: tí at eg havi opnað mín munn at HARRANUM, og eg kann ei fara tilbakar.

36 Og hon segði við hann, Mín faðir, *um* tú hevurt opnað tín munn at HARRANUM, ger við meg samsvarandi við tað sum hevur útgingið út úr munni tínum; so mikið sum HARRIN hevur tikið hevnd fyri teg av fíggindum tínum, *enntá* av børnum Ammons.

37 Og hon segði við faðir sín, Lat hetta tingið verða gjørt fyri meg: lat meg einsamalla *í* tveir mánaðir, at eg má fara niðan og

oman uppiá fjøllunum, og gráta mín jomfrúdóm, eg og felagar mínir.

38 Og hann segði, Far. Og hann sendi hana burtur *í* tveir mánaðir: og hon fór við lagssystrum sínum, og græt sín jomfrúdóm uppiá fjøllunum.

39 Og tað bar á við endan á tveimum mánaðum, at hon vendi aftur at faðir sínum, sum gjørdi við hana *samsvarandi* við heiti sítt, sum hann hevði heitt: og hon kendi ongan mann. Og tað var ein skikkur í Ísrael,

40 *At* Ísraels døtur fóru árliga at harma dóttur Jĕph'-thăh Gileadita fýra dagar um árið.

KAPITUL 12

OG menninir av Ē'-phră-ĭm savnaðu seg saman, og fóru norðureftir, og søgdu við Jĕph'-thăh, Hvørsvegna fórt tú yvir at berjast ímóti børnum Ammons, og kallaðirt ikki okkum at fara við tær? vit vilja brenna títt hús omanyvir teg við eldi.

2 Og Jĕph'-thăh segði við teir, Eg og fólk mítt vóru við mikið stríð við børn Ammons; og tá ið eg kallaði tykkum, útfríaðu tit meg ikki út úr hondum teirra.

3 Og tá ið eg sá, at tit útfríaðu *meg* ikki, setti eg lív mítt í hendur mínar, og fór yvir ímóti børnum Ammons, og HARRIN flýggjaði teir inn í hond mína: hvørsvegna eru tit tá komnir niðan at mær henda dag, at berjast ímóti mær?

4 Tá savnaði Jĕph'-thăh saman allar menninar av Gilead, og bardist við Ē'-phră-ĭm: og menninir av Gilead slógu Ē'-phră-ĭm, av tí at teir søgdu, Tit Gileaditar *eru* flóttamenn av Ē'-phră-ĭm millum Ê-phră-ĭm-ĭt'-anna, *og* millum Mănăs-sĭt'-anna.

5 Og Gileaditarnir tóku vaðini av Jordan frammi fyri Ê-phră-ĭm-ĭt'-unum: og tað varð *soleiðis,* at tá ið teir Ê-phră-ĭm-ĭt'-arnir, sum høvdu komist undan, søgdu, Lat meg fara yvirum; at menninir av Gilead søgdu við hann, *Ert* tú ein Ê-phră-ĭm-ĭt'-i? Um hann segði, Nei;

6 Tá søgdu teir við hann, Sig nú Sĭb'-bŏ-lĕth: og hann segði Sĭb'-bŏ-lĕth: tí at hann kundi ikki mynda at úttala *tað* rætt. Tá tóku teir hann, og vógu hann við vaðini av Jordan: og tað fullu á teirri tíðini av Ê-phră-ĭm-ĭt'-unum fjøruti og tvey túsund.

7 Og Jĕph'-thăh dømdi Ísrael seks ár. So doyði Jĕph'-thăh Gileaditi, og varð jarðaður í *ēinum av* staðum Gileads.

8 ¶ Og eftir hann dømdi Ĭb'-zăn úr Beth-lehem Ísrael.

9 Og hann hevði tríati synir, og tríati døtur, *hvørjar* hann sendi útumkring, og tók inn tríati døtur frá útiumkring til synir sínar. Og hann dømdi Ísrael sjey ár.

10 So doyði Ĭb'-zăn, og varð jarðaður í Beth-lehem.

11 ¶ Og eftir hann dømdi Ē'-lŏn, ein Zê-bŭ-lŏn-ĭt'-i, Ísrael; og hann dømdi Ísrael tíggju ár.

12 Og Ē'-lŏn Zê-bŭ-lŏn-ĭt'-i doyði, og varð jarðaður í Aĭ'-jă-lŏn í landi Zē'-bŭ-lŏn-s.

13 ¶ Og eftir hann dømdi Abdon Hĭl'-lĕl-s sonur, ein Pî-râ-thŏn-ĭt'-i, Ísrael.

14 Og hann hevði fjøruti synir og tríati systkinasynir, sum riðu á trísinstjúgu og tíggju asnafylum: og hann dømdi Ísrael átta ár.

15 Og Abdon Hĭl'-lĕl-s sonur Pî-râ-thŏn-ĭt'-i doyði, og varð jarðaður í Pî-rā'-thŏn í landi Ē'-phră-ĭm-s, á fjalli Â-măl-ĕk-ĭt'-anna.

KAPITUL 13

OG børn Ísraels gjørdu ilt aftur í eygsjón HARRANS; og HARRIN flýggjaði teir inn í hondina á Philistunum fjøruti ár.

2 ¶ Og tað var ein ávísur maður úr Zôr´ăh, av familju Dánitanna, hvørs navn *var* Mă-nō´ăh; og hans ektakona *var* óburin, og føddi ikki.

3 Og eingil HARRANS birtist kvinnuni, og segði við hana, Sí nú, tú *ert* óburin, og føðirt ikki: men tú skalt ala fram, og føða ein son.

4 Nú tessvegna, ver varin, eg biði teg, og drekk ikki vín ella sterkan drykk, og et ikki nakað óreint *ting:*

5 Tí at sí, tú skalt ala fram, og føða ein son; og einkið rakiblað skal koma á høvur hansara: tí at barnið skal vera ein Nazariti at Guði frá móðurlívinum: og hann skal fara undir at útfría Israel út úr hondini á Philistunum.

6 ¶ Tá kom kvinnan og taldi manni sínum, sigandi, Ein Guðs maður kom at mær, og ásjón hansara *var* líka *sum* ásjónin hjá einum eingli Guðs, sera ræðulig: men eg spurdi hann ikki hvaðani hann *var,* eiheldur segði hann mær navn sítt:

7 Men hann segði við meg, Sí, tú skalt ala fram, og føða ein son; og nú, drekk einkið vín ella sterkan drykk, eiheldur et nakað óreint *ting:* tí at barnið skal vera ein Nazariti fyri Guði frá móðurlívinum til dags deyða síns.

8 ¶ Tá nølaði Mă-nō´ăh HARRAN, og segði, O Harri mín, lat Guðs mannin, sum tú sendirt, koma aftur at okkum, og læra okkum hvat vit skulu gera yvirfyri barninum, sum skal verða føddur.

9 Og Guð lýddi á røddina hjá Mă-nō´ăh; og eingil Guðs kom aftur at kvinnuni, sum hon sat í akrinum: men Mă-nō´ăh, ektamaður hennara, *var* ikki hjá henni.

10 Og kvinnan gjørdi skjótt, og rann, og sýndi manni sínum, og segði við hann, Sí, maðurin hevur birtst at mær, sum kom at mær *hīn* dagin.

11 Og Mă-nō´ăh reistist, og fór aftaná konu síni, og kom til mannin, og segði við hann, *Ert* tú maðurin sum talaðirt við kvinnuna? Og hann segði, Eg *eri.*

12 Og Mă-nō´ăh segði, Nú lat orð tíni bera á. Hvussu skulu vit tilrættisleggja barninum, og *hvussu* skulu vit gera honum?

13 Og eingil HARRANS segði við Mă-nō´ăh, Fyri øllum, sum eg segði við kvinnuna, lat hana vera varna.

14 Hon má ikki eta av nøkrum *tingi* sum kemur av víntræinum, eiheldur lat hana drekka vín, ella sterkan drykk, ella eta nakað óreint *ting:* øllum, sum eg bjóðaði henni, lat hana geva ans *eftir.*

15 ¶ Og Mă-nō´ăh segði við eingil HARRANS, Eg biði teg, lat okkum afturhalda teg, inntil vit skulu hava gjørt tilreiðar eitt geitarlamb til tín.

16 Og eingil HARRANS segði við Mă-nō´ăh, Tó *at* tú afturhaldi meg, vil eg ikki eta av breyði tínum: og um tú vilt ofra eitt brennioffur, mást tú ofra tað at HARRANUM. Tí at Mă-nō´ăh vitsti ikki, at hann *var* ein eingil HARRANS.

17 Og Mă-nō´ăh segði við eingil HARRANS, Hvat *er* navn títt, *so* at tá ið framsagnir tínar bera á, vit mega gera tær heiður?

18 Og eingil HARRANS segði við hann, Hví spyrt tú soleiðis eftir navni mínum, eftirsum at tað *er* loyniligt?

19 So Mă-nō´ăh tók eitt geitarlamb við einum matofri, og ofraði *tað* uppiá einum kletti at HARRANUM: og *eingilin* gjørdi undursamliga; og Mă-nō´ăh og kona hansara hugdu at.

20 Tí at tað bar á, tá ið flamman fór upp ímóti himni oman av altarinum, at eingil HARRANS

steig upp í flammu altarsins. Og Mă-nŏ´-ăh og kona hansara hugdu at *tí,* og fullu á andlit síni til jarðarinnar.

21 Men eingil HARRANS birtist ikki meira fyri Mă-nŏ´-ăh og fyri konu hansara. Tá vitsti Mă-nŏ´-ăh, at hann *var* ein eingil HARRANS.

22 Og Mă-nŏ´-ăh segði við konu sína, Vit skulu vissuliga doyggja, av tí at vit hava sæð Guð.

23 Men kona hansara segði við hann, Um HARRIN hevði tokka *í* at drepa okkum, vildi hann ikki havt tikið ímóti einum brenniofri og einum matofri av hondum okkara, eiheldur vildi hann havt sýnt okkum allar hesar *lutir,* ella vildi, sum á hesi tíð, havt sagt okkum *slíkar lutir* sum hesar.

24 ¶ Og kvinnan føddi ein son, og kallaði navn hansara Samson: og barnið vaks, og HARRIN vælsignaði hann.

25 Og Andi HARRANS byrjaði at eggja hann til tíðir í leiri Dáns ímillum Zôr´-ăh og Ĕsj-tā´-ŏl.

KAPITUL 14

OG Samson fór oman til Tĭm´-năth, og sá eina kvinnu í Tĭm´-năth, av døtrunum hjá Philistunum.

2 Og hann kom upp, og segði faðir sínum og móður síni frá, og segði, Eg havi sæð eina kvinnu í Tĭm´-năth, av døtrunum hjá Philistunum: nú tessvegna, fáið mær hana til ektakonu.

3 Tá søgdu faðir hansara og móðir hansara við hann, *Er tað* aldri ein kvinna millum døtur brøðra tína, ella millum alt fólk mítt, at tú fert at taka eina konu av hinum óumskornu Philistunum? Og Samson segði við faðir sín, Fá mær hana; tí at hon toknar mær væl.

4 Men faðir hansara og móðir hansara vitstu ikki, at tað *var* av HARRANUM, at hann søkti høvi ímóti Philistunum: tí á teirri tíðini høvdu Philistarnir harradømi yvir Ísrael.

5 ¶ So fór Samson oman, og faðir hansara og móðir hansara, til Tĭm´-năth, og komu til víngarðar Tĭm´-năth-s: og sí, ein ung leyva ýldi ímóti honum.

6 Og Andi HARRANS kom mektigani uppá hann, og hann skræddi hana, sum hann vildi havt skrætt eitt geitarlamb, og *hann hevði* einkið í hond síni: men hann segði ikki faðir sínum ella móður síni, hvat hann hevði gjørt.

7 Og hann fór oman, og talaði við kvinnuna; og hon toknaði Samsoni væl.

8 ¶ Og eftir eina tíð vendi hann aftur at taka hana, og hann vendi til viks at síggja ræið av leyvuni: og sí, *har var* eitt vað av býflugum og hunangur í ræi leyvunnar.

9 Og hann tók harav í hendur sínar, og fór áfram etandi, og kom til faðir sín og móður sína, og hann gav teimum, og tey ótu: men hann segði ikki teimum frá, at hann hevði tikið hunangin út úr ræi leyvunnar.

10 ¶ So faðir hansara fór oman at kvinnuni: og Samson gjørdi har eina veitslu; tí at soleiðis plagdu teir ungu menninir at gera.

11 Og tað bar á, tá ið teir sóu hann, at teir komu við tríati fylgdarsveinum at vera við honum.

12 ¶ Og Samson segði við teir, Eg vil nú seta fram eina gátu at tykkum: um tit vissuliga kunnu greina mær hana innanfyri teir sjey dagarnar av veitsluni, og finna útav *henni,* tá vil eg geva tykkum tríati línklæðir og tríati skifti av klæðum:

13 Men um tit kunnu ikki greina mær *hana,* tá skulu tit geva mær tríati línklæðir og tríati skifti av klæðum. Og teir søgdu

við hann, Set fram tína gátu, at vit mega hoyra hana.

14 Og hann segði við teir, Út úr etaranum kom fram matur, og út úr tí sterka kom fram søtsemi. Og teir kundu ikki í tríggjar dagar útleggja gátuna.

15 Og tað bar á í tí sjeynda deginum, at teir søgdu við konu Samsons, Lokka mann tín, at hann má greina okkum gátuna, at ikki vit brenni teg og faðirs tíns hús við eldi: hava tit kallað okkum til at taka tað vit hava? *er tað* ikki *so?*

16 Og kona Samsons græt frammi fyri honum, og segði, Tú bert hatart meg, og elskart meg ei: tú hevurt sett fram eina gátu at børnum fólks míns, og hevurt ikki sagt *hana* mær. Og hann segði við hana, Sí, eg havi ikki sagt faðir mínum ella móður míni *hana,* og skal eg siga tær *hana?*

17 Og hon græt frammi fyri honum teir sjey dagarnar, meðan teirra veitsla vardi: og tað hendi á tí sjeynda deginum, at hann segði henni, av tí at hon lá sáran uppiá honum: og hon segði gátuna fyri børnum fólks síns.

18 Og menninir av staðinum søgdu við hann á tí sjeynda deginum, áðrenn sólin fór niður, Hvat *er* søtari enn hunangur? og hvat *er* sterkari enn ein leyva? Og hann segði við teir, Um tit ikki høvdu pløgt við kvígu míni, høvdu tit ikki funnið útav gátu míni.

19 ¶ Og Andi HARRANS kom uppá hann, og hann fór oman til Ăsj′-kē-lŏn, og vó tríati menn av teimum, og tók ránsfæ teirra, og gav skifti av klæðum at teimum sum útløgdu gátuna. Og hansara firtni varð kynd, og hann fór upp til húsar faðirs síns.

20 Men kona Samsons varð *givin* til fylgdarsvein hansara, hvønn hann hevði brúkt sum vin sín.

KAPITUL 15

MEN tað bar á innanfyri eina stund aftaná, í hveitiheystar tíðini, at Samson vitjaði konu sína við einum geitarlambi; og hann segði, Eg vil fara inn til konu mína inn í kamarið. Men faðir hennara vildi ikki loyva honum at fara inn.

2 Og faðir hennara segði, Eg sanniliga helt, at tú hevðirt aldeilis hatað hana; tí gav eg hana til felaga tín: *er* ikki yngra systir hennara vakrari enn hon? tak hana, eg biði teg, ístaðin fyri hana.

3 ¶ Og Samson segði viðvíkjandi teimum, Nú skal eg vera meiri ólastandi enn Philistarnir, hóast eg geri teimum eina misnøgd.

4 Og Samson fór og fangaði trý hundrað revar, og tók eldfaklar, og vendi hala til hala, og setti ein eld-fakkul í miðjuna ímillum tveir halar.

5 Og tá ið hann hevði sett eld á faklarnar, læt hann *teir* fara inn í tað standandi kornið hjá Philistunum, og brendi upp bæði bundini, og eisini tað standandi kornið, við víngørðunum *og* olivintrøum.

6 ¶ Tá søgdu Philistarnir, Hvør hevur gjørt hetta? Og teir svaraðu, Samson, versonurin hjá Tĭm-nīt′-anum, av tí at hann hevði tikið konu hansara, og givið hana til fylgdarsvein hansara. Og Philistarnir komu upp, og brendu hana og faðir hennara við eldi.

7 ¶ Og Samson segði við teir, Hóast tit havi gjørt hetta, tó vil eg verða hevndur á tykkum, og eftir tað vil eg gevast.

8 Og hann sló teir, hoft og lær, við eini miklari slátran: og hann fór oman og dvaldist á toppinum av klettinum Ē′-tăm.

9 ¶ Tá fóru Philistarnir upp, og slógu upp í Judah, og breiddu seg í Lē´-hī.
10 Og menninir av Judah søgdu, Hví eru tit komnir upp ímóti okkum? Og teir svaraðu, Til at binda Samson eru vit komnir upp, at gera við hann, eins og hann hevur gjørt við okkum.
11 Tá fóru trý túsund menn av Judah til toppin av klettinum Ē´-tăm, og søgdu til Samsons, Veitst tú ikki, at Philistarnir *eru* stjórnarar yvir okkum? hvat *er* hetta *sum* tú hevurt gjørt okkum? Og hann segði við teir, Eins og teir gjørdu mær, soleiðis havi eg gjørt teimum.
12 Og teir søgdu við hann, Vit eru komnir oman at binda teg, at vit mega flýggja teg inn í hondina á Philistunum. Og Samson segði við teir, Svørjið mær, at tit vilji ikki falla uppá meg sjálvir.
13 Og teir talaðu við hann, sigandi, Nei; men vit vilja binda teg fast, og flýggja teg inn í hond teirra: men vissuliga, vit vilja ikki drepa teg. Og teir bundu hann við tveimum nýggjum bondum, og førdu hann upp frá klettinum.
14 ¶ *Og* tá ið hann kom at Lē´-hī, rópaðu Philistarnir ímóti honum: og Andi HARRANS kom mektigani uppá hann, og bondini, sum *vóru* uppiá ørmum hansara, gjørdust sum hørur, sum varð brendur við eldi, og hansara bond loystust uttan av hondum hansara.
15 Og hann fann eitt nýtt kjálkabein av einum asna, og setti fram hond sína, og tók tað, og vá eitt túsund menn við tí.
16 Og Samson segði, Við kjálkabeininum av einum asna, rúgvur omaná rúgvur, við kjálkanum av einum asna havi eg vigið eitt túsund mans.
17 Og tað bar á, tá ið hann hevði lokið við at tala, at hann kastaði burtur kjálkabeinið út úr hond síni, og kallaði tað plássið Rá´-măth-lē´-hī.
18 ¶ Og hann var sára tyrstur, og kallaði á HARRAN, og segði, Tú hevurt givið hesa miklu útfrían inn í hond tænara tíns: og nú, skal eg doyggja vegna torsta, og falla inn í hondina á teimum óumskornu?
19 Men Guð kleiv eitt innanopið stað, sum *var* í kjálkanum, og tað kom vatn harúr; og tá ið hann hevði drukkið, kom andi hansara aftur, og hann endurlívgaðist: hvørsvegna hann kallaði navnið hará Ĕn-hăk-kôr´-ē, sum *er* í Lē´-hī at hesum degi.
20 Og hann dømdi Ísrael á døgum Philistanna tjúgu ár.

KAPITUL 16

TÁ fór Samson til Gā´-zā, og sá har eina skøkju, og fór inn at henni.
2 *Og tað varð sagt* Gâ-zīt´-unum, sigandi, Samson er komin higar. Og teir umringaðu *hann* inn, og lógu *á* lúri eftir honum alla nátt í staðarportrinum, og vóru stillir alla náttina, sigandi, Um morgunin, tá ið tað er dagur, skulu vit drepa hann.
3 Og Samson lá til midnátt, og reistist á midnátt, og tók dyrnar á staðarportrinum, og stólparnar tveir, og fór burtur við teimum, tvørstong og øllum, og setti *tey* uppá herðar sínar, og bar tey upp til toppin av einum hóli, sum *er* frammanfyri Hē´-brōn.
4 ¶ Og tað bar á aftaná, at hann elskaði eina kvinnu í Sôr´-ĕk-s dalinum, hvørs navn *var* Dĕ-lī´-lăh.
5 Og fúrstarnir hjá Philistunum komu niðan at henni, og søgdu við hana, Lokka hann, og síggj, hvarí hansara mikla styrki *liggur,* og við hvørjum *midlum* vit mega hava yvirvág ímóti honum, at vit mega binda hann, at níva

hann: og vit vilja geva tær, hvør *og* ēin av okkum, ellivu hundrað *stykkir* av silvuri.

6 ¶ Og Dē-lī´-lăh segði til Samsons, Sig mær, eg biði teg, hvarí tín mikla styrki *liggur,* og hvarvið tú máttirt verðið bundin, til at níva teg.

7 Og Samson segði við hana, Um teir bindi meg við sjey grønum streingjum, sum aldri vórðu turkaðir, tá skal eg verða veikur, og verða sum ein annar maður.

8 Tá førdu fúrstarnir hjá Philistunum upp til hennara sjey grønar streingir, sum høvdu ikki verðið turkaðir, og hon bant hann við teimum.

9 Nú, *tað vóru* menn, liggjandi á lúri, dvøljandi hjá henni í skemmuni. Og hon segði við hann, Philistarnir *veri* uppiá tær, Samson. Og hann sleit streingirnar, eins og ein tráður av togi verður slitin, tá ið hann nertur við eldin. So hansara styrki varð ikki kend.

10 Og Dē-lī´-lăh segði við Samson, Sí, tú hevurt háðað meg, og sagt mær lygnir: nú sig mær, eg biði teg, hvarvið tú máttirt verðið bundin.

11 Og hann segði við hana, Um teir bindi meg fast við nýggjum reipum, sum aldri vóru í nýtslu, tá skal eg verða veikur, og verða sum ein annar maður.

12 Dē-lī´-lăh tessvegna tók nýggj reip, og bant hann harvið, og segði við hann, Philistarnir *veri* uppiá tær, Samson. Og *tað vóru* liggjarar á lúri, dvøljandi í kamarinum. Og hann sleit tey uttan av ørmum sínum, líka *sum* ein tráð.

13 Og Dē-lī´-lăh segði við Samson, Higartil hevurt tú háðað meg, og sagt mær lygnir: sig mær hvarvið tú máttirt verðið bundin. Og hann segði við hana, Um tú vevurt teir sjey lokkarnar á høvdi mínum við vevinum.

14 Og hon festi *tað* við stiftini, og segði við hann, Philistarnir *veri* uppiá tær, Samson. Og hann vaknaði úr svøvni sínum, og fór avstað við bummstiftini, og við vevinum.

15 ¶ Og hon segði við hann, Hvussu kanst tú siga, Eg elski teg, tá ið títt hjarta *er* ikki hjá" mær? tú hevurt háðað meg hesar tríggjar ferðirnar, og hevurt ikki sagt mær, hvarí tín mikla styrki *liggur.*

16 Og tað bar á, tá ið hon trýsti hann dagligani við orðum sínum, og noyddi hann, *so* at sál hansara varð plágað at deyða;

17 At hann segði henni alt sítt hjarta, og segði við hana, Tað hevur ikki komið rakiblað uppá høvur mítt; tí at eg *havi verið* ein Nazariti at Guði frá lívmóður móður mínar: um eg verði rakaður, tá vil mín styrki fara frá mær, og eg skal gerast veikur, og verða líka *sum* einhvør *annar* maður.

18 Og tá ið Dē-lī´-lăh sá, at hann hevði sagt henni alt sítt hjarta, sendi hon og kallaði eftir fúrstunum hjá Philistunum, sigandi, Komið upp hesa ēinu ferðina, tí at hann hevur sýnt mær alt sítt hjarta. Tá komu fúrstarnir hjá Philistunum niðan at henni, og bóru pening í hond síni.

19 Og hon fekk hann *at* sova uppiá knøum sínum; og hon kallaði eftir einum manni, og hon voldi honum at raka av teir sjey lokkarnar á høvdi hansara; og hon byrjaði at níva hann, og hansara styrki fór frá honum.

20 Og hon segði, Philistarnir *veri* uppiá tær, Samson. Og hann vaknaði úr sínum svøvni, og segði, Eg vil fara út, sum við onnur skiftir áður, og rysta meg. Og hann vitsti ikki, at HARRIN var vikin frá honum.

21 ¶ Men Philistarnir tóku hann, og koyrdu út eygu hansara, og førdu hann oman til Gā´zā, og bundu hann við fjøtrum av messing; og hann mól *á kvørn* í fangahúsinum.

22 Hóast hetta, hárið á høvdi hansara byrjaði at vaksa aftur, eftir *at* hann var rakaður.

23 Tá savnaðu fúrstarnir hjá Philistunum seg saman, fyri at ofra eitt mikið sláturoffur at Dā´gŏn, gudi sínum, og at fegnast: tí at teir søgdu, Okkara gudur hevur flýggjað Samson, fígginda okkara, inn í hond okkara.

24 Og tá ið fólkið sá hann, prísaðu teir gudi sínum: tí at teir søgdu, Okkara gudur hevur flýggjað inn í okkara hendur okkara fígginda, og oyðaran av landi okkara, sum vá mangar av okkum.

25 Og tað bar á, tá ið teirra hjørtu vóru kát, at teir søgdu, Kallið Samson, at hann má gera okkum stuttleika. Og teir kallaðu Samson út úr fangahúsinum; og hann gjørdi teimum stuttleika: og teir settu hann ímillum súlurnar.

26 Og Samson segði við piltin sum helt í hond hansara, Loyv mær, at eg má trilva á súlunum, hvaruppiá húsið stendur, at eg má lenast uppá tær.

27 Nú, húsið var fult av monnum og kvinnum; og allir fúrstarnir hjá Philistunum *vóru* har; og *tað vóru* uppiá takinum umleið trý túsund menn og kvinnur, sum eygleiddu, meðan Samson gjørdi stuttleika.

28 Og Samson kallaði á HARRAN, og segði, O Harri GUÐ, minst til mín, eg biði teg, og styrk meg, eg biði teg, bert hesa ēinu ferðina, O Guð, at eg má verða alt fyri eitt hevndur yvir Philistarnar fyri eygu míni tvey.

29 Og Samson tók hald á teimum tveimum miðsúlunum, uppiá hvørjum húsið stóð, og á hvørjum tað varð borið uppi, á teirri ēinu við síni høgru hond, og á hīnari við síni vinstru.

30 Og Samson segði, Lat meg doyggja við Philistunum. Og hann boygdi seg við *allari* megi *síni;* og húsið fell omanyvir fúrstarnar, og omanyvir alt fólkið sum *vóru* harí. So tey deyðu sum hann vó við deyða sín, vóru fleiri enn *tey* sum hann vó í lívi sínum.

31 Tá komu brøður hansara og alt hús faðirs hansara oman, og tóku hann, og førdu *hann* niðan, og jarðaðu hann ímillum Zôr´-āh og Ēsj-tā´-ōl, í jarðingarplássi Mă-nō´-āh, faðirs hansara. Og hann dømdi Ísrael tjúgu ár.

KAPITUL 17

OG tað var ein maður av Ē´-phră-īm fjalli, hvørs navn *var* Mī´-căh.

2 Og hann segði við móður sína, Teir ellivu hundrað *sjē´-kl-arnir* av silvuri, sum vórðu tiknir frá tær, um hvørjar tú bannaðirt, og talaðirt um eisini í oyru míni, sí, silvurið *er* hjá mær; eg tók tað. Og móðir hansara segði, Vælsignaður *veri tú* av HARRANUM, sonur mín.

3 Og tá ið hann hevði endurbøtt teir ellivu hundrað *sjē´-kl-arnar* av silvuri til móður sína, segði móðir hansara, Eg hevði heil*veg*is vígt silvurið at HARRANUM frá hond míni til sonar míns, at gera eina rista mynd og eina brædda mynd: nú tessvegna, eg vil endurbøta tær tað.

4 Tó endurbøtti hann peningin at móður síni; og móðir hansara tók tvey hundrað *sjē´-kl-ar* av silvuri, og gav teir til stoyparans, hvør gjørdi harúr eina rista mynd og eina brædda mynd: og tær vóru í húsi Mī´-căh.

5 Og maðurin Mī´-căh hevði eitt gudahús, og gjørdi eina ê-phōd´-u,

og tĕr′-ă-phĭm, og innvígaði ēin av sonum sínum, sum gjørdist prestur hansara.

6 Í teimum døgum *var* eingin kongur í Ísrael, *men* hvør maður gjørdi *tað sum* rætt *var* í egnu eygum sínum.

7 ¶ Og tað var ein ungur maður út úr Beth-lehem-judah, av familjuni hjá Judah, sum *var* ein Leviti, og hann útisat har.

8 Og maðurin fór avstað út úr staðinum frá Beth-lehem-judah, at útisita har hann kundi finna *eitt pláss:* og hann kom til Ē′-phră-ĭm fjalls til húsar Mĭ′-căh, sum hann ferðaðist.

9 Og Mĭ′-căh segði við hann, Hvaðan kemurt tú? Og hann segði við hann, Eg *eri* ein Leviti úr Beth-lehem-judah, og eg fari at útisita har eg kann finna *eitt pláss*.

10 Og Mĭ′-căh segði við hann, Dvølst hjá mær, og ver mær ein faðir og ein prestur, og eg vil geva tær tíggju *sjē′-kl-ar* av silvuri um árið, og eitt sett av skartaklæði, og tínar vistir. So Levitin fór inn.

11 Og Levitin var nøgdur at dvøljast hjá manninum; og tann ungi maðurin var honum sum ēin av sonum hansara.

12 Og Mĭ′-căh innvígaði Levitan; og tann ungi maðurin gjørdist prestur hansara, og var í húsi Mĭ′-căh.

13 Tá segði Mĭ′-căh, Nú veit eg, at HARRIN vil gera mær gott, eftirsum *at* eg havi ein Levit til *mín* prest.

KAPITUL 18

Í TEIMUM døgum *var* eingin kongur í Ísrael: og í teimum døgum søkti ættargrein Dánitanna sær ein arv at dvøljast í; tí at *fram*at tí degi hevði *allur teirra* arvur ikki fallið at teimum millum ættargreina Ísraels.

2 Og Dáns børn sendu av famillju síni fimm menn frá breddum sínum, reystsemis menn, frá Zôr′-ăh, og frá Ēsj-tā′-ōl, at njósna út landið, og at kanna tað; og teir søgdu við teir, Farið, kannið landið: hvørjir, tá ið teir komu til Ē′-phră-ĭm fjalls, til húsar Mĭ′-căh, hildu teir til har.

3 Tá ið teir *vóru* hjá húsi Mĭ′-căh, kendu teir røddina hjá tí unga manninum, Levitanum: og teir vendu inn hagar, og søgdu við hann, Hvør førdi teg higar? og hvat gert tú í hesum *plássinum?* og hvat hevurt tú her?

4 Og hann segði við teir, Soleiðis og soleiðis fer Mĭ′-căh við mær, og hevur leigað meg, og eg eri prestur hansara.

5 Og teir søgdu við hann, Spyr *um* ráð, vit biðja teg, av Guði, at vit mega vita, hvørt vegur okkara, sum vit fara, skal verða framgangsríkur.

6 Og presturin segði við teir, Farið í friði: frammi fyri HARRANUM *er* vegur tykkara, á hvørjum tit fara.

7 ¶ Tá fóru teir fimm menninir avstað, og komu til Lā′-ĭsj, og sóu fólkið sum *vóru* hará, hvussu teir búðu sorgleysir, eftir háttarlagi Zī-dō′-nĭ-aranna, stillir og tryggir; og *har var* eingin stýrismaður í landinum, sum kundi sett *teir* til skammar í *nøkrum* luti; og teir *vóru* langt frá Zī-dō′-nĭ-arunum, og høvdu einkið viðurskifti við *nakran* mann.

8 Og teir komu at brøðrum sínum til Zôr′-ăh og Ēsj-tā′-ōl: og teirra brøður søgdu við teir, Hvat *siga* tit?

9 Og teir søgdu, Reisist, at vit mega fara niðan ímóti teimum: tí at vit hava sæð landið, og sí, tað *er* sera gott: og *eru* tit stillir? verið ikki latir at fara, *og* at fara inn at ognast landið.

10 Tá ið tit fara, skulu tit koma at einum fólki, tryggum, og

til eitt stórt land: tí at Guð hevur givið tað inn í hendur tykkara; eitt plass, har *tað er* einkið trot á nøkrum tingi, sum *er* á jørðini.

11 ¶ Og tað fóru haðani frá av familju Dánitanna, út úr Zŏr′ăh og út úr Ĕsj-tā′-ŏl, seks hundrað menn, útnevndir, við krígsvápnum.

12 Og teir fóru upp, og slógu upp í Kĭr′-jăth-jē′-ă-rĭm, í Judah: hvørsvegna teir kallaðu tað plássið Má′-hă-nēh-dán at hesum degi: sí, *tað er* aftanfyri Kĭr′-jăth-jē′-ă-rĭm.

13 Og teir fóru yvir haðani at Ē′-phră-ĭm fjalli, og komu at húsi Mĭ′-căh.

14 ¶ Tá tóku til orða teir fimm menninir sum fóru at njósna út land Lá′-ĭsj, og søgdu við brøður sínar, Vita tit, at tað er í hesum húsunum ein ê-phōd′-a, og tĕr′-ă-phĭm, og ein rist mynd, og ein brædd mynd? nú tessvegna, umhugsið hvat tit eiga at gera.

15 Og teir vendu hagarmót, og komu til húsar unga mansins, Levitans, *enntá* at húsi Mĭ′-căh, og heilsaðu honum.

16 Og teir seks hundrað menninir, útnevndir, við sínum krígsvápnum, sum *vóru* av Dáns børnum, stóðu við inngongdina av portrinum.

17 Og teir fimm menninir, sum fóru at njósna út landið, fóru upp, *og* komu inn hagar, *og* tóku hina ristu mynd, og ê-phōd′-una, og tĕr-ă-phĭm′-in, og hina brædda mynd: og presturin stóð í inngongdini av portrinum, við teimum seks hundrað monnunum *sum vóru* útnevndir við krígsvápnum.

18 Og hesir fóru inn í hús Mĭ′-căh, og heintaðu ta telgdu myndina, ê-phōd′-una, og tĕr-ă-phĭm′-in, og hina bræddu mynd. Tá segði presturin við teir, Hvat gera tit?

19 Og teir søgdu við hann, Halt friði tínum, legg tína hond uppá tín munn, og gakk við okkum, og ver fyri okkum ein faðir og ein prestur: *er tað* betri hjá tær at vera ein prestur at húsinum hjá einum manni, ella at tú veri ein prestur at eini ættargrein og eini familju í Ísrael?

20 Og prestsins hjarta varð glatt, og hann tók ê-phōd′-una, og tĕr-ă-phĭm′-in, og hina ristu mynd, og fór í miðjum fólkinum.

21 So teir vendu og fóru avstað, og settu hini smáu og fenaðin og viðførningin frammanfyri sær.

22 ¶ *Og* tá ið teir vóru ein góðan veg frá húsinum hjá Mĭ′-căh, vórðu menninir, sum *vóru* í húsunum nær við húsið hjá Mĭ′-căh, savnaðir saman, og innheintaðu Dáns børn.

23 Og teir róptu á Dáns børn. Og teir vendu andlitum sínum, og søgdu við Mĭ′-căh, Hvat bagir tær, at tú kemurt við einum slíkum samlagi?

24 Og hann segði, Tit hava tikið mínar gudar, sum eg gjørdi, og prestin, og tit eru farnir avstað: og hvat havi eg meira? og hvat *er* hetta *sum* tit siga við meg, Hvat bagir tær?

25 Og Dáns børn søgdu við hann, Lat ei tína rødd verða hoyrda okkara millum, at ikki firtnir felagar renni uppá teg, og tú missi títt lív, við lívunum hjá húski tínum.

26 Og Dáns børn fóru sín veg: og tá ið Mĭ′-căh sá, at teir *vóru* ov sterkir fyri hann, vendi hann og fór tilbakar at húsi sínum.

27 Og teir tóku *tingini* sum Mĭ′-căh hevði gjørt, og prestin sum hann hevði, og komu at Lá′-ĭsj, at einum fólki *sum vóru* við stilli og tryggir: og teir slógu teir við svørðseggini, og brendu staðin við eldi.

28 Og *har var* eingin útfríari, av tí at tað *var* langt frá Zĭ′-dōn, og teir høvdu einkið viðurskifti við *nakran* mann; og tað var í dal-

inum sum *liggur* hjá Bĕth-rē´-hŏb. Og teir bygdu ein stað, og dvaldust harí.

29 Og teir kallaðu navnið á staðinum Dán, eftir navninum hjá Dáni, faðiri sínum, sum var føddur at Ísrael: hvussu enn er, navnið á staðinum *var* Lá´-ĭsj í fyrstani.

30 ¶ Og Dáns børn settu upp hina ristu mynd: og Jónathan, sonur Gĕr´-sjŏm-s, sonar Mă-năs´-sĕh, hann og synir hansara vóru prestar fyri ættargrein Dáns inntil dagin av fangaskapi landsins.

31 Og teir settu sær upp hina ristu mynd Mĭ´-căh, sum hann gjørdi, alla ta tíð sum hús Guðs var í Sjĭ´-lôh.

KAPITUL 19

OG tað bar á í teimum døgum, tá ið *tað var* eingin kongur í Ísrael, at tað var ein ávísur Leviti, útisitandi á síðuni av Ē´-phră-ĭm fjalli, hvør tók til sín eina medkonu út úr Beth-lehem-judah.

2 Og hansara medkona spældi horan ímóti honum, og fór avstað frá honum at húsi faðirs síns til Beth-lehem-judah, og var har fýra heilar mánaðir.

3 Og hennara ektamaður reistist, og fór eftir henni, til at tala vinarliga við hana, *og* at føra hana aftur, havandi sín tænara við sær, og eitt par av asnum: og hon førdi hann inn í hús faðirs síns: og tá ið faðirin at gentuni sá hann, fegnaðist hann *um* at møta honum.

4 Og hansara verfaðir, faðirin at gentuni, afturhelt hann; og hann varð hjá honum tríggjar dagar: so teir ótu og drukku, og hildu til har.

5 ¶ Og tað hendi á tí fjórða deginum, tá ið teir reistust árla um morgunin, at hann reis upp til at fara avstað: og faðirin at gentuni segði við verson sín, Ugga títt hjarta við einum breyðmola, og síðan far tín veg.

6 Og teir settust niður, og ótu og drukku báðir av teimum saman: tí at faðirin at gentuni hevði sagt við mannin, Lat tær lynda, eg biði teg, og steðga alla nátt, og lat títt hjarta vera kátt.

7 Og tá ið maðurin reis upp til at fara avstað, strongdi hansara verfaðir á hann: tí helt hann til har aftur.

8 Og hann reistist árla um morgunin á hinum fimta degi til at fara avstað: og faðirin at gentuni segði, Ugga títt hjarta, eg biði teg. Og teir dvaldu inntil eftirmiddag, og teir ótu báðir teirra.

9 Og tá ið maðurin reis upp til at fara avstað, hann, og medkona hansara, og hansara tænari, segði verfaðir hansara, faðirin at gentuni, við hann, Sí, nú dregst dagurin ímóti kvøldi, eg biði tykkum steðga alla nátt: sí, dagurin tekur at halla, halt til her, at títt hjarta má vera kátt; og í morgin komið tykkum árla á tykkara veg, at tú mást fara heim.

10 Men maðurin vildi ikki steðga ta náttina, men hann reis upp og fór avstað, og kom yvir ímóti Jĕ´-bŭs, sum *er* Jerusalem; og *tað vóru* við honum tveir asnar saðlaðir, hansara medkona eisini *var* við honum.

11 *Og* tá ið tey *vóru* hjá Jĕ´-bŭs, var *tað* nógv liðið út á dagin; og tænarin segði við meistara sín, Komið, eg biði tygum, og latum okkum venda inn í henda stað hjá Jĕb-ŭ-sīt´-unum, og halda til í honum.

12 Og hansara meistari segði við hann, Vit vilja ikki venda til viks higar inn í staðin hjá einum fremmandum, sum *er* ikki av Ísraels børnum; vit vilja fara yvir til Gĭ-bē´-ŭh.

13 Og hann segði við tænara

sín, Kom, og latum okkum nærkast til ēitt av hesum plássunum til at halda til *í* alla nátt, í Gī-bē´-ŭh, ella í Rá´-măh.

14 Og teir fóru áfram og fóru sín veg; og sólin fór niður uppá teir, *tá ið teir vóru* hjá Gī-bē´-ŭh, sum *hoyrir* til Benjamins.

15 Og teir vendu til viks hagar, til at fara inn *og* at halda til í Gī-bē´-ŭh: og tá ið hann fór inn, setti hann seg niður í eini gøtu av staðinum: tí at *tað var* eingin maður sum tók tey inn í hús sítt at hýsast.

16 ¶ Og sí, tað kom ein gamal maður frá sínum arbeiði uttan av akrinum um aftan, sum *var* eisini av Ē´-phră-ĭm fjalli; og hann útisat í Gī-bē´-ŭh: men menninir av plássinum *vóru* Benjamitar.

17 Og tá ið hann hevði lyft upp eygum sínum, sá hann ein vegfarandi mann í gøtuni av staðinum: og tann gamli maðurin segði, Hvagar fert tú? og hvaðan kemurt tú?

18 Og hann segði við hann, Vit fara yvir frá Beth-lehem-judah ímóti síðuni av Ē´-phră-ĭm fjalli; haðani frá *eri* eg: og eg fór til Beth-lehem-judah, men eg fari *nú* til húss HARRANS; og tað *er* eingin maður sum tekur ímóti mær til húsa.

19 Tó er tað bæði hálmur og fóður til asnar okkara; og tað er breyð og vín eisini til mín, og til medkonu mína, og til tann unga mannin *sum er* við tænarum tínum: *tað er* eingin skortur á nøkrum tingi.

20 Og tann gamli maðurin segði, Friður *veri* við tær; hvussu enn er, *lat* allar tínar skortir *liggja* uppiá mær; einans halt ikki til í gøtuni.

21 So hann førdi hann inn í hús sítt, og gav asnum hansara fóður: og teir tvógu føtur sínar, og ótu og drukku.

22 ¶ *Nú,* sum teir gjørdu hjørtu síni fró, sí, menninir av staðinum, ávísir Bē´-lĭ-ăl-s synir, umgirdu húsið runt umkring, *og* bardu við hurðina, og talaðu til meistaran av húsinum, gamla mannin, sigandi, Før fram mannin sum kom inn í hús títt, at vit mega kenna hann.

23 Og maðurin, meistarin av húsinum, fór út at teimum, og segði við teir, Nei, brøður mínir, *nei,* eg biði tykkum, gerið ikki *so* vondliga; eftirsum at hesin maðurin er komin inn í hús mítt, gerið ikki henda dárskap.

24 Sí, *her er* dóttir mín – ein moyggj, og medkona hansara; tær vil eg føra út nú, og eyðmýkið tit tær, og gerið við tær hvat tykkum tykir gott: men innat hesum manni gerið ikki so ringt eitt ting.

25 Men menninir vildu ikki lýða á hann: so maðurin tók medkonu sína, og førdi hana fram at teimum; og teir kendu hana, og misbrúktu hana alla náttina inntil morgunin: og tá ið dagurin tók at upprenna, lótu teir hana fara.

26 Tá kom kvinnan í degningi dagsins, og fell niður við dyrnar á húsi mansins, har harri hennara *var,* til tað var ljóst.

27 Og harri hennara reis upp um morgunin, og opnaði dyrnar á húsinum, og fór út til at fara sín veg: og sí, kvinnan, medkona hansara, var dottin niður *við* dyrnar á húsinum, og hennara hendur *vóru* uppiá gáttini.

28 Og hann segði við hana, Upp, og latum okkum sleppa *okkum* avstað. Men eingin svaraði. Tá tók maðurin hana *upp* uppá ein asna, og maðurin reis upp, og slapp sær at plássi sínum.

29 ¶ Og tá ið hann var komin inn í hús sítt, tók hann ein knív, og legði hald á medkonu sína, og skifti hana *sundur, saman* við beinum hennara, í tólv stykkir,

og sendi hana inn í allar breddar Ísraels.

30 Og tað varð so, at allir sum sóu tað, søgdu, Tað varð eingin slík gerð gjørd ella sædd frá tí degi ið Ísraels børn komu upp út úr Egyptalandi, at hesum degi: hugleiðið tað, takið tilráðing, og talið *hugar tykkara*.

KAPITUL 20

TÁ fóru øll børn Ísraels út, og samkoman varð savnað saman sum ein maður, frá Dán enntá til Bēēr´-sjē-bŭ, við landi Gileads, at HARRANUM í Mīz´-pēh.

2 Og teir fremstu av øllum fólkinum, *enntá* av øllum ættargreinum Ísraels, framstillaðu seg sjálvar í savnaði fólks Guðs, fýra hundrað túsund fótmenn sum drógu svørð.

3 (Nú, Benjamins børn hoyrdu, at Ísraels børn vóru farnir upp til Mīz´-pēh.) Tá søgdu børn Ísraels, Sigið *okkum,* hvussu varð henda vondska?

4 Og Levitin, ektamaðurin hjá kvinnuni sum var vigin, svaraði og segði, Eg kom inn í Gī-bē´-ŭh, sum *hoyrir* til Benjamins, eg og medkona mín, at hýsast.

5 Og menninir úr Gī-bē´-ŭh risu ímóti mær, og umringaðu húsið runt umkring uppá meg um náttina, *og* hugsaðu at hava vigið meg: og mína medkonu hava teir noytt, at hon er deyð.

6 Og eg tók mína medkonu, og skar hana í stykkir, og sendi hana út gjøgnum alt land Ísraels arvs: tí at teir hava framt skammloysi og dárskap í Ísrael.

7 Sí, tit *eru* allir børn av Ísrael; gevið her tykkara tilráðing og ráðgeving.

8 ¶ Og alt fólkið reistist sum ein maður, sigandi, Vit vilja ikki, nakar *av okkum,* fara til tjald sítt, eiheldur vilja vit, nakar *av okkum,* venda inn í hús sítt.

9 Men nú, hetta *skal vera* tað tingið, sum vit vilja gera við Gī-bē´-ŭh; *vit vilja fara upp* eftir lut*akasti* ímóti henni;

10 Og vit vilja taka tíggju menn av einum hundraði út gjøgnum allar ættargreinir Ísraels, og eitt hundrað av einum túsundi, og eitt túsund burtur úr tíggju túsundum, at heinta vistir til fólkið, at teir mega gera, tá ið teir koma til Gī-bē´-ŭh Benjamins, samsvarandi við allan tann dárskap sum teir hava virkað í Ísrael.

11 So allir menninir av Ísrael vórðu savnaðir ímóti staðinum, knýttir saman sum ein maður.

12 ¶ Og ættargreinir Ísraels sendu menn gjøgnum alla ættargrein Benjamins, sigandi, Hvør vondska *er* henda, sum er gjørd tykkara millum?

13 Nú tessvegna, flýggið *okkum* menninar, Bē´-lĭ-ăl-s børnini, sum *eru* í Gī-bē´-ŭh, at vit mega taka teir av lívi, og koyra burtur ilt frá Ísrael. Men Benjamins børn vildu ikki lurta eftir røddini hjá bróðrum sínum, Ísraels børnum:

14 Men Benjamins børn savnaðu seg saman út úr staðunum til Gī-bē´-ŭh, til at fara út til orrustu ímóti børnum Ísraels.

15 Og Benjamins børn vórðu upptaldir á teirri tíðini burtur úr staðunum tjúgu og seks túsund menn sum drógu svørð, umframt íbúgvarnar av Gī-bē´-ŭh, sum vórðu upptaldir sjey hundrað útvaldir menn.

16 Millum alt hetta fólk *vóru tað* sjey hundrað útvaldir menn, vinstrahentir; hvør *og* ein kundi sleingja steinar til eina hár*breidd,* og ikki misraka.

17 Og menninir av Ísrael, umframt Benjamin, vórðu upptaldir fýra hundrað túsund menn sum drógu svørð: allir hesir *vóru* krígsmenn.

18 ¶ Og Ísraels børn reistust, og fóru upp til húsar Guðs, og spurdu ráð av Guði, og søgdu, Hvør av okkum skal fara upp fyrst til bardagan ímóti børnum Benjamins? Og HARRIN segði, Judah *skal fara upp* fyrst.

19 Og Ísraels børn risu upp um morgunin, og leiraðust ímóti Gĭ-bē´-ūh.

20 Og menninir av Ísrael fóru út til bardaga ímóti Benjamin; og menninir av Ísrael stillaðu seg sjálvar í uppstilling til at berjast ímóti teimum í Gĭ-bē´-ūh.

21 Og Benjamins børn komu fram úr Gĭ-bē´-ūh, og oyddu niður til grundar av Ísraelitunum tann dagin tjúgu og tvey túsund menn.

22 Og fólkið, menninir av Ísrael, løgdu mót í seg, og stillaðu sín bardaga aftur í uppstilling í tí plássinum, har teir stillaðu seg sjálvar í uppstilling hin fyrsta dagin.

23 (Og Ísraels børn fóru upp og grótu frammi fyri HARRANUM inntil aftan, og umbóðu ráð av HARRANUM, sigandi, Skal eg fara upp aftur til bardaga ímóti børnum Benjamins, bróður míns? Og HARRIN segði, Far upp ímóti honum.)

24 Og Ísraels børn komu nær ímóti Benjamins børnum annan dagin.

25 Og Benjamin fór fram ímóti teimum út úr Gĭ-bē´-ūh annan dagin, og oyddi niður til grundar av Ísraels børnum aftur átjan túsund menn; allir hesir drógu svørðið.

26 ¶ Tá fóru øll børn Ísraels, og alt fólkið, upp, og komu inn í hús Guðs, og grótu, og sótu har frammi fyri HARRANUM, og fastaðu tann dagin inntil aftan, og ofraðu brennioffur˘ og friðoffur˘ frammi fyri HARRANUM.

27 Og Ísraels børn fregnaðu av HARRANUM, (tí at ørk sáttmála Guðs *var* har í teimum døgum,

28 Og Phī´-nĕ-hās, sonur Ĕl-ĕ-ā´-zâr-s, sonar Aarons, stóð frammanfyri henni í teimum døgum,) sigandi, Skal eg uppaftur fara út til bardaga ímóti børnum Benjamins, bróður míns, ella skal eg gevast? Og HARRIN segði, Far upp; tí at í morgin vil eg flýggja teir inn í hond tína.

29 Og Ísrael setti liggjarar á lúri rundan um Gĭ-bē´-ūh.

30 Og Ísraels børn fóru upp ímóti Benjamins børnum á tí triðja deginum, og stillaðu seg í uppstilling ímóti Gĭ-bē´-ūh, eins og við onnur skiftir.

31 Og Benjamins børn fóru út ímóti fólkinum, *og* vórðu drignir burtur frá staðinum; og teir byrjaðu at sláa av fólkinum, *og* drepa, eins og við onnur skiftir, á alfaravegunum, av hvørjum ēin fer upp til húsar Guðs, og hīnum til Gĭ-bē´-ūh á akrinum, umleið tríati menn av Ísrael.

32 Og Benjamins børn søgdu, Teir *eru* slignir niður frammi fyri okkum, eins og í fyrstani. Men Ísraels børn søgdu, Latum okkum flýggja, og draga teir frá staðinum at alfaravegunum.

33 Og allir menninir av Ísrael risu upp út úr plássi sínum, og stillaðu seg í uppstilling við Bā´-ăl-tā´-mâr: og liggjararnir á lúri hjá Ísrael komu fram út úr plássum sínum, *enntá* burtur úr ongunum av Gĭ-bē´-ūh.

34 Og tað komu ímóti Gĭ-bē´-ūh tíggju túsund útvaldir menn út úr øllum Ísrael, og bardagin var svárur: men teir vitstu ikki, at ilt *var* nær teimum.

35 Og HARRIN sló Benjamin frammi fyri Ísrael: og Ísraels børn oyddu av Benjamitunum tann dagin tjúgu og fimm túsund og eitt hundrað menn: allir hesir drógu svørðið.

36 So Benjamins børn sóu, at teir vóru slignir: tí at menninir av Ísrael góvu pláss til Benjamitanna, av tí at teir litu á liggjarar-

nar á lúri, sum teir høvdu sett við síðuna av Gī-bē´-ŭh.

37 Og liggjararnir á lúri skundaðu *sær,* og stormaðu uppá Gī-bē´-ŭh; og liggjararnir á lúri drógu *seg* frameftir, og slógu allan staðin við svørðseggini.

38 Nú, tað var eitt ásett tekin ímillum menninar av Ísrael og liggjararnar á lúri, at teir skuldu fáa eina mikla flammu við royki *at* rísa upp út úr staðinum.

39 Og tá ið menninir av Ísrael tóku *seg* aftur í bardaganum, fór Benjamin undir at sláa *og* drepa av monnunum av Ísrael umleið tríati persónar: tí at teir søgdu, Vissuliga eru teir slignir niður frammi fyri okkum, sum *í* tí fyrsta bardaganum.

40 Men tá ið flamman byrjaði at reisast upp út úr staðinum við einum roykstólpa, hugdu Benjamitarnir afturum seg, og sí, flamman úr staðinum steig upp til himins.

41 Og tá ið menninir av Ísrael vendu aftur, vórðu menninir av Benjamin ógvaðir: tí at teir sóu, at ilt var komið uppá teir.

42 Tí vendu teir *sínar ryggir* frammi fyri monnunum av Ísrael at vegi oyðunnar; men bardagin innheintaði teir; og teir, sum *komu* út úr staðunum, oyddu teir í miðju teirra.

43 *Svá* innilokaðu teir Benjamitarnar runt um, *og* eltu teir, *og* tróðu teir niður við løttum yvir ímóti Gī-bē´-ŭh ímóti sólarrisinum.

44 Og tað fullu av Benjamin átjan túsund menn; allir hesir *vóru* reystsemis menn.

45 Og teir vendu og flýddu ímóti oyðuni at kletti Rimmons: og teir fingrakaðu av teimum á alfaravegunum fimm túsund menn; og eltu hart eftir teimum at Gī´dóm, og vógu tvey túsund menn av teimum.

46 So at allir, sum fullu tann dagin av Benjamin, vóru tjúgu og fimm túsund menn sum drógu svørðið; allir hesir *vóru* reystsemis menn.

47 Men seks hundrað menn vendu og flýddu til oyðunnar at klettinum Rimmon, og vórðu í klettinum Rimmon fýra mánaðir.

48 Og menninir av Ísrael vendu aftur uppá Benjamins børn, og slógu teir við svørðseggini, eins væl menninar av *hvørjum* staði, sum djórið, og alt sum kom til handar: teir eisini settu eld á allar staðirnar sum teir komu til.

KAPITUL 21

NÚ, menninir av Ísrael høvdu svorið í Mīz´-pēh, sigandi, Tað skal ikki nakar av okkum geva sína dóttur at Benjamin til ektakonu.

2 Og fólkið kom til húsar Guðs, og varð har til aftan frammi fyri Guði, og lyftu upp røddum sínum, og grótu sáran;

3 Og søgdu, O HARRI Guð Ísraels, hví hevur hetta borið á í Ísrael, at tað skuldi vera í dag ein ættargrein vantandi í Ísrael?

4 Og tað bar á um morgisárið, at fólkið reis árla, og bygdu har eitt altar, og ofraðu brennioffur˘ og friðoffur˘.

5 Og Ísraels børn søgdu, Hvør *er tað* millum alra ættargreina Ísraels, sum kom ikki upp við samkomuni at HARRANUM? Tí at teir høvdu gjørt ein miklan eið viðvíkjandi honum sum kom ikki niðan til HARRANS til Mīz´-pēh, sigandi, Hann skal vissuligani verða tikin av lívi.

6 Og Ísraels børn iðraðu seg vegna Benjamins, bróðurs teirra, og søgdu, Tað er ein ættargrein skorin av frá Ísrael henda dag.

7 Hvussu skulu vit gera til ektakonur til teirra sum eru eftir, við tað at vit hava svorið við HARRAN, at vit vilja ikki geva teimum av døtrum várum til ektakonur?

8 ¶ Og teir søgdu, Hvør ēin *er tað* av ættargreinum Ísraels, sum kom ikki niðan til Mīz´-pēh til HARRANS? Og sí, tað kom eingin til leirin frá Já´-bĕsj-gī´-lĕ-ăd til savnaðarins.

9 Tí at fólkini vórðu upptøld, og sí, *tað vóru* eingir av íbúgvum Já´-bĕsj-gī´-lĕ-ăd-s har.

10 Og samkoman sendi hagar tólv túsund menn av teimum reystastu, og skipaðu teimum, sigandi, Farið og sláið íbúgvar Já´-bĕsj-gī´-lĕ-ăd-s við svørðseggini, við kvinnunum og børnunum.

11 Og hetta *er* tingið sum tit skulu gera, Tit skulu aldeilis oyða hvørt kallkyn, og hvørja kvinnu sum hevur ligið við manni.

12 Og teir funnu millum íbúgvanna av Já´-bĕsj-gī´-lĕ-ăd fýra hundrað ungar jomfrýr, sum ongan mann høvdu kent viðˆ at liggja við nøkrum kallkyni: og teir førdu tær at leirinum til Sjī´-lôh, sum *er* í landi Cānaans.

13 Og heila samkoman sendi *nakrar* at tala til Benjamins barna, sum *vóru* í klettinum Rimmon, og at kalla friðsamligani at teimum.

14 Og Benjamin kom aftur á teirri tíð; og teir góvu teimum ektakonur sum teir høvdu bjargað á lívi av kvinnunum úr Já´-bĕsj-gī´-lĕ-ăd: og tó soleiðis vóru tær ikki nóg mikið hjá teimum.

15 Og fólkið iðraði seg yvir Benjamin, av tí at HARRIN hevði gjørt eitt skarð í ættargreinir Ísraels.

16 ¶ Tá søgdu teir elstu av samkomuni, Hvussu skulu vit gera til konur til teirra sum eru eftir, eftirsum *at* kvinnurnar eru oyddar úr Benjamin?

17 Og teir søgdu, *Tað má vera* ein arvur til teirra sum veri *seg* undanslopnir av Benjamin, at ein ættargrein verði ikki oydd úr Ísrael.

18 Hvussu enn er, vit mega ikki geva teimum konur av døtrum várum: tí at Ísraels børn hava svorið, sigandi, Bannaður *veri* hann, sum gevur eina konu til Benjamins.

19 Tá søgdu teir, Sí, *tað er* ein hátíð HARRANS í Sjī´-lôh árliga *í einum plássi* sum *er* á norður síðuni av Beth-el, á eystur síðuni av alfaraveginum sum fer niðan frá Beth-el til Sjē´-chĕm, og sunnanfyri Lĕ-bō´-năh.

20 Tí skipaðu teir Benjamins børnum, sigandi, Farið og liggið á lúri í víngørðunum;

21 Og síggið, og sí, um Sjī´-lôh-s døtur komi út at dansa í dansum, tá komið tit út úr víngørðunum, og fangið tykkum hvør maður sítt vív av døtrum Sjī´-lôh-s, og farið til lands Benjamins.

22 Og tað skal verða, tá ið fedrar teirra, ella brøður teirra, komi at okkum at klaga, at vit vilja siga við teir, Verið góðvildarsamir at teimum fyri okkara sakir: av tí at vit afturhildu ikki til hvørs mans ektakonu hans í krígnum: tí at tit góvu ikki at teimum á hesi tíð, *at* tit skuldu verðið sekir.

23 Og Benjamins børn so gjørdu, og tóku *sær* konur, samsvarandi við tal teirra, av teimum sum dansaðu, hvørjar teir fangaðu: og teir fóru og vendu aftur at arvi sínum, og gjørdu í stand staðirnar, og dvaldust í teimum.

24 Og Ísraels børn fóru avstað haðani á teirri tíð, hvør maður til ættargrein sína og til familju sína, og teir fóru út haðani frá, hvør maður til arv sín.

25 Í teimum døgum *var tað* eingin kongur í Ísrael: hvør maður gjørdi *tað sum* rætt *var* í egnu eygum sínum.

RUTHAR BÓK.

KAPITUL 1

NÚ, tað bar á í teimum døgunum, tá ið dómararnir stjórnaðu, at tað var ein hungursneyð í landinum. Og ein ávísur maður úr Beth-lehem-judah fór at útisita í landi Móabs, hann, og kona hansara, og hansara tveir synir.

2 Og navnið hjá manninum *var* Ê-lîm´-ĕ-lĕch, og navnið hjá konu hansara Nā-ŏ´-mī, og navnið hjá hansara tveim sonum Mâh´-lŏn og Chĭ´-lī-ŏn, Êph-rā-thīt´-ar úr Beth-lehem-judah. Og tey komu inn í land Móabs, og hildu áfram har.

3 Og Ê-lîm´-ĕ-lĕch, ektamaður Nā-ŏ´-mī-ar, doyði; og hon var eftir, og hennara tveir synir.

4 Og teir tóku sær konur av kvinnum Móabs; navnið hjá tí ēinu *var* Ôr´-pāh, og navnið hjá hīnari Ruth: og tey dvaldust har umleið tíggju ár.

5 Og Mâh´-lŏn og Chĭ´-lī-ŏn doyðu eisini báðir av teimum; og kvinnan var eftirlatin av sínum tveim sonum og ektamanni sínum.

6 ¶ Tá reistist hon við verðtrum sínum, at hon mátti venda aftur frá landi Móabs: tí at hon hevði hoyrt í landi Móabs, hvussu ið HARRIN hevði vitjað fólk sítt, í at geva teimum breyð.

7 Hvørsvegna hon fór fram úr tí plássinum har hon var, og hennara tvær verðotur við henni; og tær fóru á veginum til at venda aftur at landi Judah.

8 Og Nā-ŏ´-mī segði við sínar tvær verðotur, Farið, vendið aftur, hvør til húsar móður sínar: HARRIN fari blídligani við tykkum, eins og tit hava farið við hinum deyðu, og við mær.

9 HARRIN veiti tykkum, at tit mega finna hvílu, hvør *av tykkum* í húsi ektamans síns. Síðan kysti hon tær; og tær lyftu upp rødd síni, og grótu.

10 Og tær søgdu við hana, Vissuliga vilja vit venda aftur við tær at fólki tínum.

11 Og Nā-ŏ´-mī segði, Vendið aftur, døtur mínar: hví vilja tit fara við mær? *eru* tað enn *nakrir fleiri* synir í móðurlívi mínum, at teir mega verða ektamenn tykkara?

12 Vendið aftur, døtur mínar, farið *tykkara veg;* tí at eg eri ov gomul til at hava ektamann. Um eg skuldi sagt, Eg havi vón, *um* eg skuldi havt ektamann eisini í kvøld, og skuldi eisini føtt synir;

13 Vildu tit dvølt eftir teimum, til teir vórðu vaksnir? vildu tit helmað fyri teir frá at havt ektamenn? nei, døtur mínar; tí at tað harmar meg mikið fyri tykkara sakir, at hond HARRANS er farin út ímóti mær.

14 Og tær lyftu upp rødd síni, og grótu aftur: og Ôr´-pāh kysti vermóður sína; men Ruth krøktist at henni.

15 Og hon segði, Sí, versystir tín er farin tilbakar at fólki sínum, og at gudum sínum: vend tú aftur eftir versystur tíni.

16 Og Ruth segði, Strong ikki á meg til at fara frá tær, *ella* at venda aftur frá at fylgja eftir tær: tí at hvagar tú fert, vil eg fara; og har tú heldurt til, vil eg halda til: fólk títt *skal vera* fólk mítt, og Guð tín Guð mín:

17 Har *sum* tú doyrt, vil eg doyggja, og har vil eg verða jarðað: HARRIN geri soleiðis við meg, og meira við, *um okkurt* uttan deyði atskilji teg og meg.

18 Tá ið hon sá, at hon var støðugfastliga sinnað at fara við

henni, tá lætti hon *av* at tala við hana.

19 ¶ So tær tvær fóru, inntil tær komu til Beth-lehem. Og tað bar á, tá ið tær vóru komnar til Beth-lehem, at allur staðurin varð rørdur um tær, og tey søgdu, *Er* hetta Nā-ō´-mī?

20 Og hon segði við tey, Kallið meg ikki Nā-ō´-mī, kallið meg Má´-rā: tí at hin Almáttugi hevur farið sera beiskliga við mær.

21 Eg fór út full*hent,* og HARRIN hevur ført meg heim aftur tóm*henta:* hví kalla tit meg *tá* Nā-ō´-mī, við tað *at* HARRIN hevur vitnað ímóti mær, og hin Almáttugi hevur nívt meg?

22 So Nā-ō´-mī vendi aftur, og Ruth, Móabitinnan, verdóttir hennara, við henni, sum vendu aftur út úr landi Móabs: og tær komu til Beth-lehem í byrjanini av bygg heysti.

KAPITUL 2

OG Nā-ō´-mī hevði ein skyldmann hjá ektamanni sínum, ein mektigan ríkidømis mann, av familju Ê-lĭm´-ĕ-lĕch-s; og navn hansara *var* Bó´-ăz.

2 Og Ruth, Móabitinnan, segði við Nā-ō´-mī, Lat meg nú fara til akurin, og finraka øks av korni aftaná *honum,* í hvørs eygsjón eg skal finna náði. Og hon segði við hana, Far, dóttir mín.

3 Og hon fór, og kom, og finrakaði í akrinum aftaná skurðarfólkunum: og hennara tilvild var at lenda á einum parti av akrinum, *sum tilhoyrdi* Bó´-ăz-i, sum *var* av skyldfólki Ê-lĭm´-ĕ-lĕch-s.

4 ¶ Og sí, Bó´-ăz kom frá Bethlehem, og segði við skurðarfólkið, HARRIN *veri* við tykkum. Og tey svaraðu honum, HARRIN vælsigni teg.

5 Tá segði Bó´-ăz við tænara sín, sum var settur yvir skurðarfólkunum, Hvørs genta *er* hendan?

6 Og tænarin, sum var settur yvir skurðarfólkunum, svaraði og segði, Tað *er* hin Móabitiska gentan, sum kom aftur við Nā-ō´-mī, út úr landi Móabs:

7 Og hon segði, Eg biði tygum, latið meg finraka og savna aftaná skurðarfólkunum millum bundini: so hon kom, og hevur hildið áfram enntá frá morgninum inntil nú, ið hon bíðaði eitt sindur í húsinum.

8 Tá segði Bó´-ăz við Ruth, Hoyrirt tú ikki, dóttir mín? Far ikki at finraka í einum øðrum akri, eiheldur far hiðani frá, men verð her fast hjá moyggjum mínum:

9 *Lat* tíni eygu *vera* á akurin sum tær heysta, og far tú aftaná teimum: havi eg ikki álagt ungu monnunum, at teir skulu ikki nerta teg? og tá ið tú ert tyrst, far at ílátunum, og drekk av *tí* sum teir ungu menninir hava drigið.

10 Tá fell hon á andlit sítt, og boygdi seg sjálva til jarðarinnar, og segði við hann, Hví havi eg funnið náði í eygum tínum, at tú skuldirt tikið kennskap til mín, við tað at eg *eri* ein fremmand?

11 Og Bó´-ăz svaraði og segði við hana, Tað hevur full*veg*is verðið sýnt mær, alt sum tú hevurt gjørt vermóður tíni síðan deyða ektamans tíns: og *hvussu* tú hevurt eftirlatið faðir tín og móður tína, og land uppruna tíns, og ert komin at einum fólki sum tú ikki kendirt herframmanundan.

12 HARRIN viðurgjaldi verk títt, og eitt fult endurgjald verði givið tær av HARRANUM Guði Ísraels, undir hvørs veingjum tú ert komin at troysta.

13 Tá segði hon, Lat meg finna góðvild í eygsjón tíni, harri mín; tí at tú hevurt uggað meg, og tí at tú hevurt talað vinarliga við tænastumoyggj tína, hóast eg veri

meg ikki lík ēinari av tænastumoygjum tínum.

14 Og Bóʹăz segði við hana, Við máltíðar-tíð kom tú higar, og et av breyðinum, og dyppa tín bita í edikin. Og hon sat við liðina á skurðarfólkunum: og hann rætti henni sviðið *korn,* og hon át, og varð mettað, og leivdi.

15 Og tá ið hon var risin upp at fínraka, bjóðaði Bóʹăz ungu monnum sínum, sigandi, Latið hana fínraka, enntá millum bundini, og lastið hana ikki:

16 Og latið falla eisini *summar* av krummunum av tilætlan til hennara, og latið *tær* vera, at hon má fínraka *tær,* og hartið hana ikki.

17 So hon fínrakaði í akrinum inntil aftan, og bukaði út tað *sum* hon hevði fínrakað: og tað var umleið ein ēʹphâh av byggi.

18 ¶ Og hon tók *tað* upp, og fór inn í staðin: og hennara vermóðir sá tað *sum* hon hevði fínrakað: og hon førdi fram, og gav til hennara tað *sum* hon hevði goymt, eftir *at* hon var mettað.

19 Og hennara vermóðir segði við hana, Hvar hevurt tú fínrakað í dag? og hvar arbeiddirt tú? vælsignaður veri hann sum tók kennskap til tín. Og hon sýndi vermóður síni hjá hvørjum hon hevði arbeitt, og segði, Navnið hjá manninum, hjá hvørjum eg arbeiddi í dag, *er* Bóʹăz.

20 Og Nā-ōʹ-mī segði við verdóttur sína, Vælsignaður *veri* hann av HARRANUM, hvør ei hevur lætt av síni góðvild mót hinum livandi og mót hinum deyðu. Og Nā-ōʹ-mī segði við hana, Maðurin *er* nær í skyldleika at okkum, ēin av okkara næstu skyldmonnum.

21 Og Ruth, Móabitinnan, segði, Hann segði við meg eisini, Tú skalt halda fast hjá ungu monnum mínum, inntil teir havi endað alt mítt heyst.

22 Og Nā-ōʹ-mī segði við Ruth, verdóttur sína, *Tað er* gott, dóttir mín, at tú fari út við moyggjum hans, at tey hitti teg ikki í nøkrum øðrum akri.

23 So hon helt fast hjá moyggjum Bóʹăz-ar at fínraka *fram*at endanum á bygg heysti og á hveiti heysti; og dvaldist hjá vermóður síni.

KAPITUL 3

TÁ segði vermóðir hennara, Nā-ōʹ-mī, við hana, Dóttir mín, skal eg ikki søkja hvílu til tín, at tað má vera væl *statt* hjá tær?

2 Og nú, *er* ikki Bóʹăz av skyldfólki okkara, við hvørs moyggjum tú vart? Sí, hann sáldar bygg í kvøld í treskigólvinum.

3 Tváa tær tí, og salva teg, og koyr klæði títt uppá teg, og slepp tær oman til gólvið: *men* ger ikki teg sjálva kenda at manninum, inntil hann skal hava lokið *við* at eta og drekka.

4 Og tað skal verða, tá ið hann legst niður, at tú skalt merkja staðið har hann skal liggja, og tú skalt fara inn, og avhylja føtur hansara, og leggja teg niður; og hann vil siga tær hvat tú skalt gera.

5 Og hon segði við hana, Alt, sum tú sigurt við meg, vil eg gera.

6 ¶ Og hon fór oman at gólvinum, og gjørdi samsvarandi við alt sum hennara vermóðir beyð henni.

7 Og tá ið Bóʹăz hevði etið og drukkið, og hansara hjarta var kátt, fór hann at leggja *seg* niður við endan av rúgvuni av korni: og hon kom ljódligani, og avhuldi føtur hansara, og legði seg niður.

8 ¶ Og tað bar á við midnátt, at maðurin varð ræddur, og vendi sær: og sí, ein kvinna lá við føtur hansara.

9 Og hann segði, Hvør *ert* tú? Og hon svaraði, Eg *eri* Ruth, tænastumoyggj tín: breið tí skeyti títt yvir tænastumoyggj tína; tí at tú *ert* ein nærskyldmaður.

10 Og hann segði, Vælsignað *veri* tú av HARRANUM, dóttir mín: *tí at* tú hevurt sýnt meiri vælvilja í tí seinna endanum, enn við byrjanina, so framt sum tú ei fylgdirt ungum monnum, hvørt fátækum ella ríkum.

11 Og nú, dóttir mín, óttast ikki; eg vil gera við teg alt sum tú umbiðurt: tí at allur staður fólks míns veit, at tú *ert* ein dygdsom kvinna.

12 Og nú, tað er satt, at eg *eri* nærskyldmaður *tín:* hvussu enn er, tað er ein skyldmaður, nærri enn eg.

13 Steðga hesa nátt, og tað skal verða um morgunin, *at* um hann vilji fremja tær partin hjá einum skyldmanni, gott; lat hann gera skyldmansins part: men um hann vilji ikki gera partin hjá einum skyldmanni mót tær, tá vil eg gera partin hjá einum skyldmanni mót tær, *sum* HARRIN livir: legst niður inntil morgunin.

14 ¶ Og hon lá við føtur hansara inntil morgunin: og hon reistist upp áðrenn ein kundi kenna annan. Og hann segði, Lat tað ikki spyrjast, at ein kvinna kom inn á *treski*gólvið.

15 Eisini segði hann, Kom *við* slørinum, sum *tú hevurt* uppiá tær, og halt tí. Og tá ið hon helt tí, máldi hann seks *mál* av byggi, og legði *tað* á hana: og hon fór inn í staðin.

16 Og tá ið hon kom til vermóður sína, segði hon, Hvør *ert* tú, dóttir mín? Og hon segði henni frá øllum sum maðurin hevði gjørt mót henni.

17 Og hon segði, Hesi seks *mál* av byggi gav hann mær; tí at hann segði til mín, Far ikki tóm*hent* at vermóður tíni.

18 Tá segði hon, Sit still, dóttir mín, inntil tú viti hvussu málið vil falla *út:* tí at maðurin vil ikki vera í hvílu, inntil hann havi fullgjørt lutin henda dag.

KAPITUL 4

TÁ fór Bó-ăz niðan til portrið, og setti seg niður har: og sí, skyldmaðurin, um hvønn Bó-ăz talaði, kom framvið; við hvønn hann segði, Há, slíkur ēin! vend til viks, setst niður her. Og hann vendi til viks, og settist niður.

2 Og hann tók tíggju menn av hinum elstu staðarins, og segði, Setist tit niður her. Og teir settust niður.

3 Og hann segði við skyldmannin, Nā-ō-mī, sum er komin aftur út úr landi Móabs, selur eitt stykki av jørð, sum *var* bróðurs okkara, Ê-lĭm-ĕ-lēch-s:

4 Og eg hugsaði at lýsa tær, sigandi, Keyp *tað* frammi fyri íbúgvunum, og frammi fyri hinum elstu fólks míns. Um tú vilt endurloysa *tað,* endurloys *tað:* men um tú vilt ikki endurloysa *tað, tá* sig mær, at eg má vita: tí at *tað er* eingin at endurloysa *tað* umframt teg; og eg *eri* eftir teg. Og hann segði, Eg vil endurloysa *tað.*

5 Tá segði Bó-ăz, Hvønn dag *ið* tú keypirt akurin av hond Nā-ō-mī-ar, mást tú keypa *hann* eisini av Móabitinnuni Ruth, ektakonu hins deyða, til at reisa upp navn hins deyða uppá arv hans.

6 ¶ Og skyldmaðurin segði, Eg kann ikki endurloysa *hann* til mín sjálvs, at ikki eg skaði mín egna arv: endurloys tú mín rætt til tín sjálvs; tí at eg kann ikki endurloysa *hann.*

7 Nú, hetta *var háttarlagið* fyrr í tíð*ini* í Ísrael viðvíkjandi *tí* at endurloysa og viðvíkjandi *tí* at broyta, fyri at staðfesta allar lutir; ein maður sleit av skógv sín, og

gav *hann* til næsta sín: og hetta *var* ein vitnisburður í Ísrael.

8 Tí segði skyldmaðurin við Bó´-ăz, Keyp *hann* til tín. So hann dró av skógv sín.

9 ¶ Og Bó´-ăz segði við teir elstu, og *við* alt fólkið, Tit *eru* vitnir henda dag, at eg havi keypt alt sum *var* Ê-lím´-ĕ-lĕch-s, og alt sum *var* Chĭ´-lĭ-ŏn-s og Mâh´-lŏn-s, av hond Nā-ŏ´-mĭ-ar.

10 Harafturat, Móabitinnuna Ruth, ektakonu Mâh´-lŏn-s, havi eg keypt at vera kona mín, at reisa upp navn hins deyða uppá arv hans, at navn hins deyða verði ikki skorið av frá millum brøðra hans, og frá portri staðar hans: tit *eru* vitnir henda dag.

11 Og alt fólkið, sum *vóru* í portrinum, og hinir elstu, søgdu, *Vit eru* vitnir. HARRIN geri kvinnuna, sum er komin inn í hús títt, líka *sum* Rachel og líka *sum* Leuh, hvørjar tvær bygdu hús Ísraels: og geri tú verdiga í Êph´-rā-tăh, og verð navnframur í Beth-lehem:

12 Og lat hús títt verða líka *sum* hús Phâr´-ĕz-ar, hvønn Tá´-mâr føddi Judah, av sáðinum sum HARRIN skal geva tær av hesi ungu kvinnu.

13 ¶ So Bó´-ăz tók Ruth, og hon varð kona hansara: og tá ið hann fór inn at henni, gav HARRIN henni gitnað, og hon føddi ein son.

14 Og kvinnurnar søgdu við Nā-ŏ´-mĭ, Vælsignaður *veri* HARRIN, sum hevur ikki eftirlatið teg henda dag uttan skyldmann, at hansara navn má verða navnframt í Ísrael.

15 Og hann skal vera tær ein endurbøtari lívs *tíns,* og ein uppihaldari gamla aldurs tíns: tí at verdóttir tín, sum elskar teg, sum er betri fyri tær enn sjey synir, hevur føtt hann.

16 Og Nā-ŏ´-mĭ tók barnið, og legði tað í favn sín, og gjørdist dadda at tí.

17 Og kvinnurnar, hennara grannar, góvu tí navn, sigandi, Tað er ein sonur føddur til Nā-ŏ´-mĭ-ar; og tær kallaðu navn hansara Ō´-bĕd: hann *er* faðir Ísai-s, faðir Dávids.

18 ¶ Nú, hetta *eru* ættirnar hjá Phâr´-ĕz-i: Phâr´-ĕz gat Hĕz´-rŏn,

19 Og Hĕz´-rŏn gat Rám, og Rám gat Ăm-mĭn´-ă-dăb,

20 Og Ăm-mĭn´-ă-dăb gat Náh´-sjŏn, og Náh´-sjŏn gat Săl´-mŏn,

21 Og Săl´-mŏn gat Bó´-ăz, og Bó´-ăz gat Ō´-bĕd,

22 Og Ō´-bĕd gat Ísai, og Ísai gat Dávid.

HIN FYRRA BÓK SÁMUELS,

ANNARS KALLAÐ, HIN FYRSTA BÓK KONGANNA.

KAPITUL 1

NÚ, tað var ein ávísur maður úr Rā-mă-thá´-ĭm-zō´-phĭm, av Ē´-phră-ĭm fjalli, og hansara navn *var* Ēl´-kā-năh, sonur Jē-ró´-hăm-s, sonar Ē´-lĭ-hū, sonar Tō´-hū, sonar Zuph-s, ein Ēph-rā-thīt´-i:

2 Og hann hevði tvær ektakonur; navnið hjá tí ēinu *var* Hannah, og navnið hjá hīnari Pē-nĭn´-năh: og Pē-nĭn´-năh hevði børn, men Hannah hevði eingi børn.

3 Og hesin maðurin fór upp út úr staði sínum árliga at tilbiðja og at sláturofra at HARRA herliðanna

í Sjï´-lôh. Og teir tveir synirnir hjá Ē´-lī, Hŏp̲h´-nī og P̲hī´-nĕ-hās, prestar HARRANS, *vóru* har.

4 ¶ Og tá ið tíðin varð, at Ĕl´-kă-năh ofraði, gav hann til Pĕ-nĭn´-nŭh, ektakonu sínar, og til alra sona hennara og døtra hennara, skamtir:

5 Men innat Hannuh gav hann ein verdigan skamt; tí hann elskaði Hannuh: men HARRIN hevði lokað fyri móðurlív hennara.

6 Og hennara mótstandari eisini tirraði hana sáran, fyri at fáa hana *at* ergrast, av tí at HARRIN hevði lokað aftur móðurlív hennara.

7 Og *sum* hann gjørdi soleiðis ár um ár, tá ið hon fór niðan til húss HARRANS, soleiðis tirraði hon hana; tí græt hon, og át ikki.

8 Tá segði Ĕl´-kă-năh, ektamaður hennara, til hennara, Hannah, hví grætur tú? og hví eturt tú ikki? og hví er hjarta títt harmað? *eri* ikki eg betri fyri tær enn tíggju synir?

9 ¶ So Hannah reis upp, eftir *at* tey høvdu etið í Sjï´-lôh, og eftir *at* tey høvdu drukkið. Nú, Ē´-lī prestur sat uppiá einum sæti við ein stólpa av templi HARRANS.

10 Og hon *var* í sálar-beiskleika, og bað at HARRANUM, og græt sáran.

11 Og hon strongdi eitt heiti, og segði, O HARRI herliðanna, um tú vilt í roynd *og veru* hyggja á nívdina hjá tænastumoyggj tíni, og minnast mín, og ikki gloyma tænastumoyggj tína, men vilt geva tænastumoyggj tíni eitt sveinsbarn, tá vil eg geva hann at HARRANUM allar dagar lívs hans, og tað skal einkið rakiblað koma uppá høvur hans.

12 Og tað bar á, sum hon helt áfram biðjandi frammi fyri HARRANUM, at Ē´-lī *legði* til merkis munn hennara.

13 Nú Hannah, hon talaði í hjarta sínum; bara hennara varrar fluttust, men hennara rødd varð ikki hoyrd: Ē´-lī tessvegna helt, *at* hon hevði verið drukkin.

14 Og Ē´-lī segði við hana, Hvussu leingi vilt tú vera drukkin? koyr burtur vín títt frá tær.

15 Og Hannah svaraði og segði, Nei, harri mín, eg *eri* ein kvinna av einum sorgarfullum anda: eg havi drukkið hvørki vín ella sterkan drykk, men havi helt út mína sál frammi fyri HARRANUM.

16 Rokna ei tína tænastumoyggj fyri eina Bē´-lī-ăl-s dóttur: tí út úr ríkiligleikanum av míni klagu og harmi havi eg talað higartil.

17 Tá svaraði Ē´-lī og segði, Far í friði: og Guð Ísraels veiti *tær* tína umbøn, sum tú hevurt umbiðið av honum.

18 Og hon segði, Lat tína tænastumoyggj finna náði í eygsjón tíni. So kvinnan fór sín veg, og át, og hennara ásjón var ei meira *døpur*.

19 ¶ Og tey risu upp um morgunin árla, og tilbóðu frammi fyri HARRANUM, og vendu aftur, og komu til húsar síns til Rá´-măh: og Ĕl´-kă-năh kendi Hannuh, ektakonu sína; og HARRIN mintist til hennara.

20 Hvørsvegna tað bar á, tá ið tíðin var komin íkring, eftir *at* Hannah hevði alið fram, at hon føddi ein son, og kallaði navn hansara Sámuel, *sigandi*, Av tí at eg havi umbiðið hann av HARRANUM.

21 Og maðurin Ĕl´-kă-năh, og alt hús hansara, fóru niðan at ofra at HARRANUM tað árliga sláturofrið, og heiti sítt.

22 Men Hannah fór ikki upp; tí hon segði við mann sín, *Eg vil ikki fara niðan*, inntil barnið verði avvant, og *tá* vil eg koma við honum, at hann má birtast frammi fyri HARRANUM, og har verða um ævir.

23 Og Ĕl′-kă-năh, ektamaður hennara, segði við hana, Ger tað *sum* tær tykir gott; dvølj inntil tú havi avvant hann; einans HARRIN staðfesti orð sítt. So kvinnan varð *verandi*, og gav syni sínum *at* súgva, inntil hon avvandi hann.

24 ¶ Og tá ið hon hevði avvant hann, tók hon hann niðan við sær, við trimum ungtarvum, og ēinari ē′-phŭh av mjøli, og einum kíki av víni, og førdi hann at húsi HARRANS í Sjī′-lôh: og barnið *var* ungt.

25 Og teir vógu ein ungtarv, og førdu barnið til Ē′-lī-ș.

26 Og hon segði, Á, harri mín, *sum* sál tín livir, harri mín, eg *eri* kvinnan sum stóð hjá tær her, biðjandi til HARRANS.

27 Um hetta barn bað eg; og HARRIN hevur givið mær mína umbøn, sum eg umbað av honum:

28 Tessvegna eisini havi eg lænt hann til HARRANS; so leingi sum hann livir, skal hann vera læntur til HARRANS. Og hann tilbað HARRAN har.

KAPITUL 2

OG Hannah bað, og segði, Mítt hjarta fegnast í HARRANUM, mítt horn er lyft upp í HARRANUM: mín muður er størraður yvir fíggindar mínar; av tí at eg fegnist í frelsu tíni.

2 *Tað er* eingin heilagur sum HARRIN: tí at *tað er* eingin umframt teg: eiheldur *er* nakar klettur líka *sum* Guð okkara.

3 Talið ei meira so avbera stoltsliga; latið *ikki* dramblæti koma út úr munni tykkara: tí at HARRIN *er* ein Guð kunnleiks, og hjá honum verða gerðir vigaðar.

4 Bogar hinna mektigu manna *eru* brotnir; og teir, sum snávaðu, eru gyrdir við styrki.

5 *Teir, sum vóru* mettir, hava leigað út seg sjálvar fyri breyð; og *teir, sum vóru* svangir, hildu uppat: so at hin óburna hevur borið sjey; og hon, sum mong hevur børn, er vorðin vesalig.

6 HARRIN drepur, og ger livandi: hann førir niður til grøvina, og førir upp.

7 HARRIN ger fátækan, og ger ríkan: hann førir lágt, og lyftir upp.

8 Hann reisir upp hin fátæka út úr støvinum, *og* lyftir upp biddaran frá tøðrúgvuni, til at seta *teir* millum prinsa, og til at fáa teir *at* arva dýrdar-hásætið: tí at súlur jarðarinnar *eru* HARRANS, og hann hevur sett heimin uppá tær.

9 Hann vil varða *um* føturnar hjá sínum heilagu, og hinir vondu skulu verða tigandi í myrkri; tí við^ styrki skal eingin maður sigra.

10 Mótstandararnir av HARRANUM skulu verða brotnir í stykkir; út úr himni skal hann *sláa* toru omanyvir teir: HARRIN skal døma endar jarðarinnar; og hann skal geva styrki at kongi sínum, og upphevja hornið hjá salvaða sínum.

11 Og Ĕl′-kă-năh fór til Rá′-măh til húsar síns. Og barnið tænti at HARRANUM frammi fyri Ē′-lī presti.

12 ¶ Nú, synirnir hjá Ē′-lī *vóru* Bĕ′-lī-ăl-s synir; teir kendu ikki HARRAN.

13 Og skikkurin hjá prestunum við fólkinum *var, at* tá ið nakar maður ofraði sláturoffur, kom tænari prestsins, meðan kjøtið var í sjóðan, við einum kjøtkróki av trimum tonnum í hond síni;

14 Og hann rendi *hann* inn í pannuna, ella ketilin, ella grýtuna, ella pottin; alt, sum kjøtkrókurin førdi upp, tók presturin til sín sjálvs. Soleiðis gjørdu teir í Sjī′-lôh at øllum Ísraelitunum, sum komu hagar.

15 Eisini áðrenn teir brendu feittið, kom tænari prestsins, og

segði til mannin sum sláturofraði, Gev kjøt at steikja til prestin; tí at hann vil ikki hava soðið kjøt av tær, men rátt.

16 Og *um* nakar maður segði við hann, Lat teir ikki svitast at brenna feittið í stundini, og *síðan* tak *so nógv* sum sál tín tráar; tá vildi hann svara honum, *Nei;* men tú skalt geva *mær tað* nú: og um ikki, vil eg taka *tað* við valdi.

17 Hvørsvegna syndin hjá ungu monnunum var sera mikil frammi fyri HARRANUM: tí at monnum stóðst við offur HARRANS.

18 ¶ Men Sámuel tænti frammi fyri HARRANUM, *verandi* eitt barn, gyrdur við eini lín ê-phōd´-u.

19 Harafturat gjørdi hansara móðir honum ein lítlan kyrtil, og kom við *honum* til hansara frá ári til árs, tá ið hon kom niðan við ektamanni sínum at ofra tað árliga sláturofrið.

20 ¶ Og Ē´-lī vælsignaði Ĕl´-kă-năh og konu hansara, og segði, HARRIN gevi tær sáð av hesi kvinnu, fyri lánið sum er lænt til HARRANS. Og tey fóru at egna heimi sínum.

21 Og HARRIN vitjaði Hannuh, so at hon ól fram, og bar tríggjar synir og tvær døtur. Og barnið Sámuel vaks frammi fyri HARRANUM.

22 ¶ Nú, Ē´-lī var sera gamalur, og hoyrdi alt sum hansara synir gjørdu at øllum Ísrael; og hvussu teir lógu við kvinnunum sum savnaðust *við* dyrnar á samkomutabernaklinum.

23 Og hann segði við teir, Hví gera tit slíkar lutir? tí eg hoyri um tykkara illu handfaringar við øllum hesum fólkinum.

24 Nei, synir mínir; tí at *tað er* eingin góð fráboðan, sum eg hoyri: tit fáa fólk HARRANS at misbróta.

25 Um ēin maður syndi ímóti einum øðrum, skal dómarin døma hann: men um maður syndi ímóti HARRANUM, hvør skal bøna fyri hann? Hóast hetta, teir lýddu ikki á rødd faðirs síns, av tí at HARRIN vildi vega teir.

26 Og barnið Sámuel vaks áfram, og var í tokka bæði hjá HARRANUM, og eisini hjá monnum.

27 ¶ Og tað kom ein Guðs maður at Ē´-lī, og segði við hann, Svá sigur HARRIN, Birtist eg týðiliga at húsi faðirs tíns, tá ið teir vóru í Egyptalandi í húsi Pharaohs?

28 Og valdi eg hann burtur úr øllum ættargreinum Ísraels *til at vera* prestur mín, at ofra uppiá altari mínum, at brenna roykilsi, at vera í eini ê-phōd´-u frammi fyri mær? og gav eg at húsi faðirs tíns øll ofrini, gjørd við eldi, hjá børnum Ísraels?

29 Hví sparka tit eftir sláturofri mínum og eftir ofri mínum, sum eg havi áboðið *í* bústaði *mínum;* og ærirt tínar synir uppum meg, til at gera tykkum sjálvar feitar við hinum fremstu av øllum ofrum Ísraels, fólks míns?

30 Hvørsvegna HARRIN Guð Ísraels sigur, Eg segði veruliga, *at* hús títt, og hús faðirs tíns, skuldi ganga frammi fyri mær um ævir: men nú sigur HARRIN, Veri tað fjart frá mær; tí at teir, sum æra meg, vil eg æra; og teir, sum vanvirða meg, skulu vera lættisliga mettir.

31 Sí, teir dagar koma, at eg vil skera av arm tín, og arm húsar faðirs tíns, at tað skal ikki vera ein gamalur maður í húsi tínum.

32 Og tú skalt síggja ein fígginda *í* bústaði *mínum,* í øllum *ríkidøminum* sum *Guð* skal geva Ísrael: og tað skal ikki vera ein gamalur maður í húsi tínum um ævir.

33 Og tann maður av tínum, *hvønn* eg skal ikki skera av frá altari mínum, *skal vera til* at upptæra eygu tíni, og til at harma hjarta títt: og øll øking húss tíns skal doyggja í blóma aldurs síns.

34 Og hetta *skal vera* eitt tekin at tær, sum skal koma uppá synir tínar tveir, á Hǒphn̆-nī og Phīn̆-nĕ-hās; í ēinum degi skulu teir doyggja, báðir teirra.

35 Og eg vil reisa mær upp ein trúfastan prest, *sum* skal gera samsvarandi við *tað* sum *er* í hjarta mínum og í huga mínum: og eg vil byggja honum eitt trygt hús; og hann skal ganga frammi fyri salvaða mínum um ævir.

36 Og tað skal bera á, *at* hvør tann sum er eftir í húsi tínum, skal koma *og* krúpa fyri honum fyri eitt stykki av silvuri og ein mola av breyði, og skal siga, Set meg, eg biði teg, inn í ēitt av presta-embætunum, at eg má eta eitt stykki av breyði.

KAPITUL 3

OG barnið Sámuel tænti at HARRANUM frammi fyri Ē′-lī. Og HARRANS orð var dýrabært í teimum døgum; *har var* eingin opin sjón.

2 Og tað hendi á teirri tíð tá ið Ē′-lī *var* lagstur niður í plass sítt, og eygu hansara byrjaðu at gerast kám, *at* hann ei kundi sjá;

3 Og áður *enn* lampa Guðs slóknaði í templi HARRANS, har *sum* ørk Guðs *var,* og Sámuel var lagstur niður *at sova;*

4 At HARRIN kallaði Sámuel: og hann svaraði, Her *eri* eg.

5 Og hann rann at Ē′-lī, og segði, Her *eri* eg; tí at tú kallaðirt meg. Og hann segði, Eg kallaði ikki; legst niður aftur. Og hann fór og legðist niður.

6 Og HARRIN kallaði uppaftur, Sámuel. Og Sámuel reistist og fór til Ē′-lī-s, og segði, Her *eri* eg; tí at tú kallaðirt meg. Og hann svaraði, Eg kallaði ikki, sonur mín; legst niður aftur.

7 Nú, Sámuel kendi ikki enn HARRAN, eiheldur var HARRANS orð enn opinberað honum.

8 Og HARRIN kallaði Sámuel aftur triðju ferðina. Og hann reistist og fór til Ē′-lī-s, og segði, Her *eri* eg; tí at tú kallaðirt meg. Og Ē′-lī varnaðist, at HARRIN hevði kallað barnið.

9 Tí segði Ē′-lī við Sámuel, Far, legst niður: og tað skal verða, um hann kalli teg, at tú skalt siga, Tala, HARRI; tí at tænari tín hoyrir. So Sámuel fór og legðist niður í plássi sínum.

10 Og HARRIN kom, og stóð, og kallaði sum við onnur skiftir, Sámuel, Sámuel. Tá svaraði Sámuel, Tala; tí at tænari tín hoyrir.

11 ¶ Og HARRIN segði til Sámuels, Sí, eg vil gera eitt ting í Ísrael, yvirfyri hvørjum tað skal ringja *fyri* báðum oyrunum á hvørjum tí sum hoyrir tað.

12 Í tí degi vil eg fremja ímóti Ē′-lī øll *ting,* sum eg havi talað viðvíkjandi húsi hansara: tá ið eg byrji, vil eg eisini gera ein enda.

13 Tí at eg havi sagt honum, at eg vil døma hansara hús um ævir fyri misgerðina sum hann veit; av tí at hansara synir gjørdu seg sjálvar ønskriligar, og hann afturhelt teimum ikki.

14 Og tí havi eg svorið húsi Ē′-lī-s, at misgerðin hjá húsi Ē′-lī-s skal ei verða reinskað við sláturofri ella ofri um ævir.

15 ¶ Og Sámuel lá inntil morgunin, og opnaði dyrnar á húsi HARRANS. Og Sámuel óttaðist at sýna Ē′-lī sjónina.

16 Tá kallaði Ē′-lī Sámuel, og segði, Sámuel, sonur mín. Og hann svaraði, Her *eri* eg.

17 Og hann segði, Hvat *er* tað tingið, sum *HARRIN* hevur sagt við teg? Eg biði teg, fjal *tað* ikki frá mær: Guð geri soleiðis við teg, og meira við, um tú fjali *nakað* ting frá mær av øllum tingunum, sum hann segði við teg.

18 Og Sámuel segði honum hvørt vet, og fjaldi einkið fyri

honum. Og hann segði, Tað *er* HARRIN: lat hann gera tað *sum* honum tykir gott.

19 ¶ Og Sámuel vaks, og HARRIN var við honum, og læt eingi av orðunum hjá sær falla til jarðarinnar.

20 Og allur Ísrael, frá Dán enntá til Bēēr´-sjē-bŭ, vitstu, at Sámuel *var* grundlagdur *til at vera* ein prophetur HARRANS.

21 Og HARRIN birtist aftur í Sjī´-lôh: tí at HARRIN opinberaði seg sjálvan fyri Sámueli í Sjī´-lôh viðˆ orði HARRANS.

KAPITUL 4

OG orð Sámuels kom til als Ísraels. Nú, Ísrael fór út ímóti Philistunum til orrustu, og sló upp við síðuna av Ēb´-ĕn-ē´-zĕr: og Philistarnir slógu upp í Ā´-phĕk.

2 Og Philistarnir stillaðu seg sjálvar í uppstilling ímóti Ísrael: og tá ið teir sameintu bardaga, varð Ísrael sligið frammi fyri Philistunum: og teir vógu av herinum í akrinum umleið fýra túsund menn.

3 ¶ Og tá ið fólkið vóru komnir inn í leirin, søgdu teir elstu av Ísrael, Hvørsvegna hevur HARRIN sligið okkum í dag frammi fyri Philistunum? Latum okkum heinta ørk sáttmála HARRANS út úr Sjī´-lôh at okkum, at tá ið hon kemur okkara millum, hon kann frelsa okkum út úr hondini á fíggindum okkara.

4 So fólkið sendi til Sjī´-lôh, at teir máttu føra haðani frá ørk sáttmála HARRA herliðanna, sum býr *ímillum* chêr-ū-bīm´-arnar: og teir tveir synirnir hjá Ē´-lī, Hŏph´-nī og Phī´-nē-hās, *vóru* har hjá ørk sáttmála Guðs.

5 Og tá ið ørk sáttmála HARRANS kom inn í leirin, rópaði allur Ísrael við einum miklum rópi, so at jørðin ringdi aftur *í*.

6 Og tá ið Philistarnir hoyrdu ljóðið av rópinum, søgdu teir, Hvat *merkir* ljóðið av hesum mikla rópi í leiri Hebrēaranna? Og teir skiltu, at ørk HARRANS var komin inn í leirin.

7 Og Philistarnir vórðu ræddir, tí at teir søgdu, Guð er komin inn í leirin. Og teir søgdu, Vei okkum! tí at tað hevur ei verið eitt slíkt ting herframmanundan.

8 Vei okkum! hvør skal útfría okkum út úr hondini á hesum mektigu Gudunum? hetta *eru* Gudarnir sum slógu Egyptarnar við øllum plágunum í oyðuni.

9 Verið sterkir, og búgvið tykkum sum menn, O tit Philistar, at tit ei verði tænarar at Hebrēarunum, eins og teir hava verið fyri tykkum: búgvið tykkum sum menn, og berjist.

10 ¶ Og Philistarnir bardust, og Ísrael varð sligið, og teir flýddu, hvør maður inn í tjald sítt: og har var ein sera mikil slátran; tí at tað fullu av Ísrael tríati túsund fótmenn.

11 Og ørk Guðs varð tikin; og teir tveir synirnir hjá Ē´-lī, Hŏph´-nī og Phī´-nē-hās, vórðu vignir.

12 ¶ Og tað rann ein maður av Benjamin út úr herinum, og kom til Sjī´-lôh hin sama dagin við klæðum sínum skrøddum, og við jørð uppiá sínum høvdi.

13 Og tá ið hann kom, sí, Ē´-lī sat uppiá einum sæti við vegkantin hyggjandi: tí at hansara hjarta skalv fyri ørk Guðs. Og tá ið maðurin kom inn í staðin, og segði frá *tí*, rópti allur staðurin út.

14 Og tá ið Ē´-lī hoyrdi ljóðið av rópingini, segði hann, Hvat *merkir* ljóðið av hesum ólætinum? Og maðurin kom inn skundisliga, og segði Ē´-lī frá.

15 Nú, Ē´-lī var níti og átta ára gamalur; og eygu hans vóru kám, at hann ei kundi sjá.

16 Og maðurin segði við Ē´-lī, Eg *eri* hann sum kom út úr herinum, og eg flýddi í dag út úr herinum. Og hann segði, Hvat er gjørt, sonur mín?

17 Og sendiboðin svaraði og segði, Ísrael er flýtt frammi fyri Philistunum, og tað hevur verið eisini eitt mikið slátur millum fólksins, og synir tínir tveir eisini, Hŏph´-nī og Phī´-nĕ-hās, eru deyðir, og ørk Guðs er tikin.

18 Og tað bar á, tá ið hann nevndi ørk Guðs, at hann datt oman av sætinum aftureftir við síðuna av portrinum, og hans hálsur brotnaði, og hann doyði: tí at hann var ein gamalur maður, og tungur. Og hann hevði dømt Ísrael fjøruti ár.

19 ¶ Og verdóttir hansara, kona Phī´-nĕ-hās-ar, var við barn, *nær við* at verða útfríað: og tá ið hon hoyrdi tíðindini, at ørk Guðs var tikin, og at verfaðir hennara og maður hennara vóru deyðir, boygdi hon seg og verkjaði; tí at pínur hennara komu uppá hana.

20 Og umkring tíðina av hennara deyða søgdu tær kvinnurnar, sum stóðu hjá henni, við hana, Óttast ikki; tí at tú hevurt føtt ein son. Men hon svaraði ikki, eiheldur gav hon gætur eftir *tí*.

21 Og hon nevndi barnið Ī´-chă-bŏd, sigandi, Dýrdin er vikin frá Ísrael: av tí at ørk Guðs var tikin, og uppá grund av verfaðir hennara og manni hennara.

22 Og hon segði, Dýrdin er vikin frá Ísrael: tí at ørk Guðs er tikin.

KAPITUL 5

OG Philistarnir tóku ørk Guðs, og førdu hana frá Ēb´-ĕn-ē´-zĕr at Ăsj´-dŏd.

2 Tá ið Philistarnir tóku ørk Guðs, førdu teir hana inn í hús Dā´-gŏn-s, og settu hana hjá Dā´-gŏn-i.

3 ¶ Og tá ið teir úr Ăsj´-dŏd reistust árla um morgisárið, sí, Dā´-gŏn *var* fallin uppá sítt andlit til jarðarinnar frammi fyri ørk HARRANS. Og teir tóku Dā´-gŏn, og settu hann í hansara pláss aftur.

4 Og tá ið teir reistust árla um morgisárs morgunin, sí, Dā´-gŏn *var* fallin uppá sítt andlit til jarðarinnar frammanfyri ørk HARRANS; og høvdið hjá Dā´-gŏn-i og báðir lógvarnir á hondum hansara *vóru* skornir av uppiá gáttini; einans *stumpurin av* Dā´-gŏn-i var eftir til hansara.

5 Tí traðka hvørki prestar Dā´-gŏn-s, ella nakrir sum koma inn í hús Dā´-gŏn-s, á gátt Dā´-gŏn-s í Ăsj´-dŏd at hesum degi.

6 Men hond HARRANS var tung uppiá teimum úr Ăsj´-dŏd, og hann oyddi teir, og sló teir við hemorīdum, *enntá* Ăsj´-dŏd og breddar tess.

7 Og tá ið menninir úr Ăsj´-dŏd sóu, at *tað var* soleiðis, søgdu teir, Ørk Guðs Ísraels skal ei verða hjá okkum: tí at hond hansara er svár uppiá okkum, og uppiá Dā´-gŏn-i, gudi várum.

8 Teir sendu tí og savnaðu allar fúrstarnar hjá Philistunum at sær, og søgdu, Hvat skulu vit gera við ørk Guðs Ísraels? Og teir svaraðu, Latið ørk Guðs Ísraels verða borna umkring at Gáth. Og teir bóru ørk Guðs Ísraels umkring *hagar*.

9 Og tað varð *so,* at eftir *at* teir høvdu borið hana umkring, var hond HARRANS ímóti staðinum við eini sera miklari oyðing: og hann sló menninar av staðinum, bæði smáar og miklar, og teir høvdu hemorīdur í sínum loyniligu pørtum.

10 ¶ Tí sendu teir ørk Guðs til Êk´-rŏn. Og tað bar á, sum ørk Guðs kom til Êk´-rŏn, at Êk-rŏn-ĭt´-arnir róptu út, sigandi, Teir

hava fört umkring ørk Guðs Ísraels til okkara, at vega okkum og fólk okkara.

11 So teir sendu og savnaðu saman allar fúrstarnar hjá Philistunum, og søgdu, Sendið burtur ørk Guðs Ísraels, og latið hana fara aftur til egna pláss sítt, at hon bani ikki okkum, og fólki várum: tí at har var ein deyðilig oyðing út gjøgnum allan staðin; hond Guðs var sera tung har.

12 Og teir menninir sum doyðu ikki, vórðu slignir við hemorīdunum: og rópið av staðinum fór upp til himins.

KAPITUL 6

OG ørk HARRANS var í landi Philistanna sjey mánaðir.

2 Og Philistarnir kallaðu prestarnar og spásagnarmenninar, sigandi, Hvat skulu vit gera við ørk HARRANS? sigið okkum, hvarvið vit skulu senda hana til pláss hennara.

3 Og teir søgdu, Um tit sendi burtur ørk Guðs Ísraels, sendið hana ikki tóma; men í øllum vísi berið honum aftur eitt misbrotsoffur: tá skulu tit verða grøddir, og tað skal verða kunnugt fyri tykkum, hví hond hans er ikki firrað frá tykkum.

4 Tá søgdu teir, Hvat *skal vera* misbrotsofrið, sum vit skulu bera aftur til hansara? Teir svaraðu, Fimm gyltar hemorīdur, og fimm gyltar mýs, *samsvarandi við* talið á fúrstunum hjá Philistunum: tí at ēin plága *var* á tykkum øllum, og á tykkara fúrstum.

5 Hvørsvegna tit skulu gera myndir av hemorīdum tykkara, og myndir av tykkara músum sum skemma landið; og tit skulu geva dýrd at Guði Ísraels: vera má, *at* hann vil lætta sína hond oman av tykkum, og oman av gudum tykkara, og oman av landi tykkara.

6 Hvørsvegna tá herða tit hjørtu tykkara, eins og Egyptarnir og Pharaoh herdu hjørtu síni? tá ið hann hevði virkað undursamliga teirra millum, lótu teir ikki fólkið fara, og teir fóru avstað?

7 Nú tessvegna, gerið eina nýggja kerru, og takið tvær mjólkikýr, á hvørjar tað einkið ok hevur komið, og bindið kýrnar til kerruna, og førið teirra kálvar heim frá teimum:

8 Og takið ørk HARRANS, og leggið hana uppá kerruna; og koyrið skartgripirnar av gulli, sum tit bera honum aftur *til* eitt misbrotsoffur, í eina kistu við lið hennara; og sendið tað avstað, at tað má fara.

9 Og síggið, um hon fer upp eftir vegi egna jaðara síns til Bēth-sjē´-mēsj, *so* hevur hann gjørt okkum hesa miklu ilsku: men um ikki, so skulu vit vita, at *tað er* ikki hond hansara *sum* sló okkum; tað *var* ein tilvild *sum* hendi fyri okkum.

10 ¶ Og menninir so gjørdu; og tóku tvær mjólkikýr, og bundu tær til kerruna, og lokaðu inni teirra kálvar heima:

11 Og teir løgdu ørk HARRANS uppá kerruna, og kistuna við mýsnum av gulli og myndunum av hemorīdum sínum.

12 Og kýrnar tóku hin beina vegin til vegar Bēth´-sjē´-mēsj, *og* fóru eftir alfaraveginum, beljandi sum tær fóru, og vendu ikki til viks *til* hinnar høgru handar, ella *til* hinnar vinstru; og fúrstarnir hjá Philistunum fóru aftaná teimum at marki Bēth´-sjē´-mēsj.

13 Og *teir úr* Bēth´-sjē´-mēsj skóru sítt hveitiheyst í dalinum: og teir lyftu upp eygum sínum, og sóu ørkina, og fegnaðust at sjá *hana*.

14 Og kerran kom inn í akurin hjá Josjua, einum Bēth-sjê-mīt´-a, og stóð har, har *tað var* ein mikil

steinur: og teir kluvu viðin av kerruni, og ofraðu kýrnar — eitt brennioffur at HARRANUM.

15 Og Levitarnir tóku niður ørk HARRANS, og kistuna sum *var* hjá henni, hvarí skartgripirnir av gulli *vóru,* og settu *teir* á hin mikla steinin: og menninir úr Bĕth´-sjē´-mēsj ofraðu brennioffur˘ og sláturofraðu sláturoffur˘ hin sama dag at HARRANUM.

16 Og tá ið teir fimm fúrstarnir hjá Philistunum høvdu sæð *tað,* vendu teir aftur til Êk´-rōn hin sama dag.

17 Og hetta *eru* tær gyltu hemorīdurnar, sum Philistarnir bóru aftur *til* eitt misbrotsoffur at HARRANUM; fyri Ăsj´-dōd ēina, fyri Gă´-zā ēina, fyri Ăs´-kē-lōn ēina, fyri Gáth ēina, fyri Êk´-rōn ēina;

18 Og tær gyltu mýsnar, *samsvarandi við* talið á øllum staðunum hjá Philistunum, *hoyrandi* til hinna fimm fúrsta, *bæði* av *víg*girdum staðum, og av landsbygdum, alt at hinum mikla *steini* Ábels, hvará teir settu niður ørk HARRANS: *hvør steinur er verandi* at hesum degi í akri Josjua, Bĕth-sjê-mĭt´-an-s.

19 ¶ Og hann sló menninar úr Bĕth´-sjē´-mēsj, av tí at teir høvdu hugt inn í ørk HARRANS, enntá hann sló av fólkinum fimti túsund og trísinstjúgu og tíggju menn: og fólkið harmaðist, av tí at HARRIN hevði sligið *mangar* av fólkinum við eini miklari slátran.

20 Og menninir av Bĕth´-sjē´-mēsj søgdu, Hvør er førur fyri at standa frammi fyri hesum heilaga HARRA Guði? og til hvønn skal hann halda avstað frá okkum?

21 ¶ Og teir sendu sendiboðar til íbúgvarnar av Kĭr´-jăth-jē´-ă-rīm, sigandi, Philistarnir hava ført aftur ørk HARRANS; komið tit oman, *og* heintið hana niðan til tykkara.

KAPITUL 7

OG menninir úr Kĭr´-jăth-jē´-ă-rīm komu, og heintaðu niðan ørk HARRANS, og førdu hana inn í hús Ă-bĭn´-ă-dăb-s á heygnum, og halgaðu Ēl-ē-ā´-zâr, son hansara, til at varðveita ørk HARRANS.

2 Og tað bar á, meðan ørkin varð í Kĭr´-jăth-jē´-ă-rīm, at tíðin var long; tí at tað vóru tjúgu ár: og alt hús Ísraels harmaðist eftir HARRANUM.

3 ¶ Og Sámuel talaði innat øllum húsi Ísraels, sigandi, Um tit vendi at HARRANUM við øllum hjørtum tykkara, *tá* koyrið burtur hinar fremmandu gudar og Ăsj´-tă-rōth tykkara millum ífrá, og fyribúgvið tykkara hjørtu at HARRANUM, og tænið honum einans: og hann vil útfría tykkum út úr hondini á Philistunum.

4 Tá koyrdu børn Ísraels burtur Bă´-ă-lĭm og Ăsj´-tă-rōth, og tæntu HARRANUM einans.

5 Og Sámuel segði, Savnið allan Ísrael til Mĭz´-pēh, og eg vil biðja fyri tykkum at HARRANUM.

6 Og teir savnaðu *seg* saman til Mĭz´-pēh, og drógu vatn, og heltu *tað* út frammi fyri HARRANUM, og fastaðu á tí deginum, og søgdu har, Vit hava syndað ímóti HARRANUM. Og Sámuel dømdi børn Ísraels í Mĭz´-pēh.

7 Og tá ið Philistarnir hoyrdu, at børn Ísraels vóru savnaðir saman til Mĭz´-pēh, fóru fúrstarnir hjá Philistunum niðan ímóti Ísrael. Og tá ið børn Ísraels hoyrdu *tað,* vóru teir ræddir fyri Philistunum.

8 Og Ísraels børn søgdu til Sámuels, Gevst ikki at rópa á HARRAN Guð váran fyri okkum, at hann vil frelsa okkum út úr hondini á Philistunum.

9 ¶ Og Sámuel tók eitt súgvandi lamb, og ofraði *tað til* eitt

brennioffur heil*veg*is at HARRANUM: og Sámuel ropti á HARRAN fyri Ísrael; og HARRIN hoyrdi hann.

10 Og sum Sámuel ofraði upp brenniofrið, nærkaðust Philistarnir til orrustu ímóti Ísrael: men HARRIN *sló* toru við einum miklum toruslátti á tí degi omanyvir Philistarnar, og avhólvaði teir; og teir vórðu slignir frammi fyri Ísrael.

11 Og menninir av Ísrael fóru út úr Mĭz´-pēh, og eltu Philistarnar, og slógu teir, inntil *teir komu* undir Bēth´-câr.

12 Tá tók Sámuel ein stein, og setti *hann* ímillum Mĭz´-pēh og Sjĕn, og kallaði navnið á honum Ĕb´-ĕn-ē´-zĕr, sigandi, Higartil hevur HARRIN hjálpt okkum.

13 ¶ So Philistarnir vórðu undirlagdir, og teir komu ei meira inn í bredda Ísraels: og HARRANS hond var ímóti Philistunum allar dagar Sámuels.

14 Og teir staðirnir, sum Philistarnir høvdu tikið frá Ísrael, vórðu endurbøttir til Ísraels, frá Êk´-rōn enntá at Gáth; og breddarnar harav útfríaði Ísrael út úr hondunum á Philistunum. Og tað var friður ímillum Ísrael og Amoritarnar.

15 Og Sámuel dømdi Ísrael allar dagar lívs síns.

16 Og hann fór frá ári til árs í ringrás til Beth-el, og Gĭl´-găl, og Mĭz´-pēh, og dømdi Ísrael í øllum teimum plássunum.

17 Og hansara afturkoma *var* til Rá´-măh; tí at har *var* hús hansara; og har dømdi hann Ísrael; og har bygdi hann eitt altar at HARRANUM.

KAPITUL 8

OG tað bar á, tá ið Sámuel var gamalur, at hann gjørdi synir sínar *til* dómarar yvir Ísrael.

2 Nú, navnið hjá hansara frumborna var Jó´-ĕl; og navnið hjá hansara næsta, Á-bĭ-ăh: *teir vóru* dómarar í Bēēr´-sjĕ-bŭ.

3 Og hansara synir gingu ikki í vegum hansara, men vendu til viks eftir vinningi, og tóku mutur˘, og spiltu dóm.

4 Tá savnaðu seg saman allir hinir elstu av Ísrael, og komu til Sámuels at Rá´-măh,

5 Og søgdu við hann, Sí, tú ert gamalur, og tínir synir ganga ikki í vegum tínum: nú, ger okkum ein kong til at døma okkum, líka *sum* allar tjóðirnar.

6 ¶ Men tað tingið mistoknaði Sámueli, tá ið teir søgdu, Gev okkum ein kong til at døma okkum. Og Sámuel bað at HARRANUM.

7 Og HARRIN segði við Sámuel, Lýð á røddina hjá fólkinum í øllum sum teir siga við teg: tí at teir hava ikki havnað tær, men teir hava havnað mær, at eg skuldi ikki ríkja yvir teimum.

8 Samsvarandi við øll verkini, sum teir hava gjørt síðan tann dag sum eg førdi teir upp út úr Egyptalandi enntá at hesum degi, hvarvið teir hava yvirgivið meg, og tænt øðrum gudum, soleiðis gera teir eisini at tær.

9 Nú tessvegna, lýð á rødd teirra: hvussu enn er, tó mótmæl álvarsamligani at teimum, og sýn teimum háttarlagið á konginum sum skal ríkja yvir teimum.

10 ¶ Og Sámuel taldi øll orðini hjá HARRANUM at fólkinum, sum umbóðu av honum ein kong.

11 Og hann segði, Hetta vil vera háttarlagið á konginum sum skal ríkja yvir tykkum: Hann vil taka synir tykkara, og útnevna *teir* til sín sjálvs, til vagna sína, og *til at vera* hestmenn hans; og *summir* skulu renna frammanfyri vagnum hansara.

12 Og hann vil útnevna sær høvuðsmenn yvir túsundum, og

høvuðsmenn yvir fimtium; og *vil seta teir* til at velta lendi hansara, og til at skera heyst hansara, og til at gera krígsamboðˇ hans, og amboðˇ hjá vagnum hans.

13 Og hann vil taka døtur tykkara *til at vera* angavatns-blandirskur, og *til at vera* kokkar, og *til at vera* bakarar.

14 Og hann vil taka akrar tykkara, og víngarðar tykkara, og olivingarðar tykkara, *enntá* hinar bestu *av teimum,* og geva *teir* til tænara sína.

15 Og hann vil taka tíggjundar-*part*in av sáði tykkara, og av víngørðum tykkara, og geva til yvirmanna sína, og til tænara sína.

16 Og hann vil taka tænastusveinar tykkara, og tænastumoyggjar tykkara, og tykkara frálíkastu ungu menn, og asnar tykkara, og seta *tey* til arbeið sítt.

17 Hann vil taka tíggjundar-*part*in av seyði tykkara: og tit skulu vera tænarar hansara.

18 Og tit skulu geyla út á tí degi uppá grund av kongi tykkara, sum tit skulu hava valt tykkum; og HARRIN vil ikki hoyra tykkum á tí degi.

19 ¶ Hóast hetta, fólkið sýtti at lýða rødd Sámuels; og teir søgdu, Nei; men vit vilja hava ein kong yvir okkum;

20 At vit eisini mega vera líka *sum* allar tjóðirnar; og at okkara kongur má døma okkum, og fara út undan okkum, og berjast okkara bardagar.

21 Og Sámuel hoyrdi øll orðini hjá fólkinum, og hann fór yvir tey aftur í oyru HARRANS.

22 Og HARRIN segði til Sámuels, Lýð á rødd teirra, og ger teimum ein kong. Og Sámuel segði við menninar av Ísrael, Farið tit hvør maður at staði sínum.

KAPITUL 9

NÚ, tað var ein maður av Benjamin, hvørs navn *var* Kisj, sonur Ā′-bĭ-ĕl-s, sonar Zē′-rôr-s, sonar Bĕ-chŏ′-răth-s, sonar Ā′-phĭ-ăh, ein Benjamiti, ein mektigur veldismaður.

2 Og hann hevði ein son, hvørs navn *var* Saul, ein úrvals ungur maður, og ein frálíkur: og *tað var* ikki Ísraels barna millum ein frálíkari persónur enn hann: frá sínum akslum og uppeftir *var hann* hægri enn nakar av fólkinum.

3 Og asnarnir hjá Kisj, faðir Sauls, vóru burturvilstir. Og Kisj segði til Sauls, sonar síns, Tak nú ein av tænarunum við tær, og reis *teg,* far *og* leita *eftir* asnunum.

4 Og hann fór um Ē′-phră-ím fjall, og fór ígjøgnum land Själ′-ī-sjă, men teir funnu *teir* ikki: tá fóru teir ígjøgnum land Sjā′-lĭm-s, og *har vóru teir* ikki: og hann fór ígjøgnum land Benjamitanna, men teir funnu *teir* ikki.

5 *Og* tá ið teir vóru komnir til land Zuphs, segði Saul til tænara síns, sum *var* við honum, Kom, og latum okkum venda aftur; at ikki faðir mín fari frá *at hava umsorgan* fyri asnunum, og stúri fyri okkum.

6 Og hann segði við hann, Sí nú, *tað er* í hesum staðinum ein Guðs maður, og *hann er* ein ærumikil maður; alt, sum hann sigur, ber vissuliga á: nú, latum okkum fara hagar; vera má, *at* hann kann sýna okkum veg okkara, sum vit skuldu farið.

7 Tá segði Saul til tænara síns, Men sí, *um* vit fari, hvat skulu vit bera manninum? tí at breyðið er brúkt í ílátum okkara, og *til er* ikki ein gáva at føra til Guðs mansins: hvat hava vit?

8 Og tænarin svaraði Sauli aftur, og segði, Sí, eg havi her við

hond fjórðingspartin av einum sjē·kl·i av silvuri: *tað* vil eg geva til Guðs mansins, at siga okkum veg okkara.

9 (Áðurfyrr í Ísrael, tá ið ein maður fór at fregnast av Guði, svá talaði hann, Kom, og lat okkum fara til síggjarans: tí at *hann, sum* nú *verður kallaður* ein Prophetur, varð áðurfyrr kallaður ein Síggjari.)

10 Tá segði Saul til tænara síns, Væl sagt; kom, latum okkum fara. So teir fóru at staðinum, har Guðs maðurin *var*.

11 ¶ *Og* sum teir fóru niðan heyggin til staðarins, funnu teir ungar moyggjar, farandi út at draga vatn, og søgdu við tær, Er síggjarin her?

12 Og tær svaraðu teimum, og søgdu, Hann er; sí, *hann er* frammanfyri tykkum: gerið skjótt nú, tí hann kom í dag til staðarins; tí at *tað er* eitt sláturoffur hjá fólkinum í dag í tí høga plássinum:

13 So skjótt sum tit veri komnir inn í staðin, skulu tit beinanvegin finna hann, áðrenn hann fari niðan til tað høga plássið at eta: tí at fólkið vil ikki eta, inntil hann komi, av tí at hann vælsignar sláturofrið; *og* síðan eta teir, sum veri bodnir. Nú tessvegna, sleppið tykkum niðan; tí um hesa tíðina skulu tit finna hann.

14 Og teir fóru niðan í staðin: *og* tá ið teir vóru komnir inn í staðin, sí, Sámuel kom út ímóti teimum, fyri at fara niðan til tað høga plássið.

15 ¶ Nú, HARRIN hevði sagt Sámueli í oyra hansara, ein dag áðrenn Saul kom, sigandi,

16 Í morgin, um hesa tíð, vil eg senda tær ein mann út úr landi Benjamins, og tú skalt salva hann *til at vera* høvuðsmaður yvir fólki mínum Ísrael, at hann má frelsa fólk mítt út úr hondini á Philistunum: tí eg havi hugt uppá fólk mítt, av tí at róp teirra er komið at mær.

17 Og tá ið Sámuel sá Saul, segði HARRIN við hann, Sí mannin, hvønn eg talaði til tín um! hesin sami skal ríkja yvir fólki mínum.

18 Tá nærkaðist Saul til Sámuels í portrinum, og segði, Sig mær, eg biði teg, hvar húsið hjá síggjaranum *er*.

19 Og Sámuel svaraði Sauli, og segði, Eg *eri* síggjarin: farið niðan undan mær at tí høga plássinum; tí at tit skulu eta við mær í dag, og í morgin vil eg lata teg fara, og vil siga tær alt sum *er* í hjarta tínum.

20 Og hvat viðvíkur asnum tínum, sum vórðu burturvilstir *fyri* trimum døgum síðani, set ikki huga tín á teir; tí at teir eru funnir. Og á hvønn *er* øll trá Ísraels? *Er hon* ikki á teg, og á alt hús faðirs tíns?

21 Og Saul svaraði og segði, *Eri* ikki eg ein Benjamiti, av hini smæstu av ættargreinum Ísraels? og mín familja hin minsta av øllum familjunum av ættargrein Benjamins? hvørsvegna talart tú tá soleiðis til mín?

22 Og Sámuel tók Saul og tænara hansara, og førdi teir inn í taksalin, og fekk teir at sita í tí fremsta plássinum millum teirra sum vóru bodnir, sum *vóru* umleið tríati persónar.

23 Og Sámuel segði við kokkin, Kom við skamtinum sum eg gav tær, um hvønn eg segði við teg, Set hann hjá tær.

24 Og kokkurin tók upp bógvin, og *tað* sum *var* uppiá honum, og setti *tað* frammanfyri Sauli. Og *Sámuel* segði, Sí tað sum er eftir! set *tað* frammanfyri tær, *og* et: tí *fram*at hesi tíð hevur tað verðið goymt til tín, síðan eg segði, Eg havi boðið fólkinum. So Saul át við Sámueli tann dagin.

25 ¶ Og tá ið teir vóru komnir oman frá tí høga plássinum inn í staðin, samtalaði *Sámuel* við Saul uppiá toppinum av húsinum.

26 Og teir reistust árla: og tað bar á umleið upprenning dagsins, at Sámuel kallaði Saul til toppin av húsinum, sigandi, Upp, at eg má senda teg avstað. Og Saul reistist, og teir fóru út, báðir av teimum, hann og Sámuel, útum.

27 *Og* sum teir fóru oman til endan á staðinum, segði Sámuel til Sauls, Bjóða tænaranum *at* fara áfram undan okkum, (og hann fór áfram,) men statt tú stillur eina stund, at eg má sýna tær orð Guðs.

KAPITUL 10

TÁ tók Sámuel eitt glas av olju, og helti *tað* uppá høvur hansara, og kysti hann, og segði, *Er tað* ikki av tí at HARRIN hevur salvað teg *til at vera* høvuðsmaður yvir arvi sínum?

2 Tá ið tú ert farin avstað frá mær í dag, tá skalt tú finna tveir menn hjá gravhýsi Rachelar í landamarki Benjamins í Zĕl′-zăh; og teir vilja siga við teg, Asnarnir, sum tú fórt at leita *eftir,* eru funnir: og sí, faðir tín er farin frá umsorganini fyri asnunum, og syrgir um tykkum, sigandi, Hvat skal eg gera fyri son mín?

3 Tá skalt tú fara áfram frameftir haðani frá, og tú skalt koma til slætta Tā′-bôr-s, og har skulu møta tær tríggir menn, farandi niðan til Guðs til Beth-el, ein berandi trý geitarlomb, og ein annar berandi trý heilbreyð, og ein annar berandi ein kík av víni:

4 Og teir vilja heilsa tær, og geva tær tvey *heil*breyð; sum tú skalt taka við av hondum teirra.

5 Eftir tað skalt tú koma til heyggjar Guðs, har setuliðið hjá Philistunum *er:* og tað skal bera á, tá ið tú ert komin hagar til staðarins, at tú skalt møta einum flokki av prophetum, komandi oman frá tí høga plássinum við einum psaltri, eini tamburīn, og eini ljóðpípu, og eini hørpu, frammanfyri sær; og teir skulu prophetera:

6 Og Andi HARRANS vil koma uppá teg, og tú skalt prophetera við teimum, og skalt verða umskiftur yvirí ein annan mann.

7 Og lat tað verða, tá ið hesi teknini eru komin at tær, *at* tú geri sum tilevni tæni tær; tí at Guð *er* við tær.

8 Og tú skalt fara oman undan mær til Gĭl′-găl; og sí, eg vil koma oman at tær, at ofra brennioffur˘, *og* at sláturofra sláturoffur˘ av friðofrum: sjey dagar skalt tú bíða, til eg komi til tín, og sýni tær hvat tú skalt gera.

9 ¶ Og tað varð *so,* at tá ið hann hevði vent baki sínum til at fara frá Sámueli, *at* Guð gav honum eitt annað hjarta: og øll tey teknini bóru á tann dagin.

10 Og tá ið teir komu hagar til heyggjarins, sí, ein flokkur av prophetum møtti honum; og Andi Guðs kom uppá hann, og hann propheteraði teirra millum.

11 Og tað bar á, tá ið allir sum kendu hann fyrr í tíð*ini* sóu, at sí, hann propheteraði prophetanna millum, tá segði fólkið hvørt til annað, Hvat *er* hetta, *sum* er komið at syni Kisj? *Er* Saul eisini prophetanna millum?

12 Og ēin av tí sama plássinum svaraði og segði, Men hvør *er* faðir teirra? Tí gjørdist tað eitt orðtak, *Er* Saul eisini prophetanna millum?

13 Og tá ið hann hevði lokið við at prophetera, kom hann til tað høga plássið.

14 ¶ Og faðirbróðir Sauls segði við hann og til tænara hansara, Hvagar fóru tit? Og hann segði, At leita *eftir* asnunum: og tá ið vit sóu, at *teir* ongasteðs *vóru,* komu vit til Sámuels.

15 Og faðirbróðir Sauls segði, Sig mær, eg biði teg, hvat Sámuel segði við tykkum.
16 Og Saul segði við faðirbróðir sín, Hann segði okkum greiniligani, at asnarnir vóru funnir. Men um søk kongadømisins, hvarum Sámuel talaði, segði hann honum ikki.
17 ¶ Og Sámuel kallaði fólkið saman at HARRANUM til Mīz´-pēh;
18 Og segði við børn Ísraels, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Eg førdi upp Ísrael út úr Egyptalandi, og útfríaði tykkum út úr hondini á Egyptunum, og út úr hondini á øllum kongadømum, *og* á teimum ið kúgaðu tykkum:
19 Og tit hava henda dag havnað Guði tykkara, sum sjálvur frelsti tykkum út úr øllum mótburðum tykkara og trongslum tykkara; og tit hava sagt við hann, *Nei,* men set ein kong yvir okkum. Nú tessvegna, framsetið tykkum framfyri HARRAN eftir ættargreinum tykkara, og eftir túsundum tykkara.
20 Og tá ið Sámuel hevði elvt øllum ættargreinunum av Ísrael at koma nær, varð ættargrein Benjamins tikin.
21 Tá ið hann hevði elvt ættargrein Benjamins at koma nær eftir familjum teirra, varð familja Mā´-trī-s tikin, og Saul, sonur Kisj, varð tikin: og tá ið teir søktu hann, kundi hann ei verða funnin.
22 Tí fregnaðu teir av HARRANUM víðari, um maðurin skuldi enn koma hagar. Og HARRIN svaraði, Sí, hann hevur fjalt seg millum tingini.
23 Og teir runnu og heintaðu hann haðani: og tá ið hann stóð millum fólksins, var hann hægri enn nakar av fólkinum, frá sínum akslum og uppeftir.
24 Og Sámuel segði til als fólksins, Síggja tit hann, hvønn HARRIN hevur valt, at *tað er* eingin líka *sum* hann millum als fólksins? Og alt fólkið rópti, og segði, Guð varði kongin.
25 Tá segði Sámuel fólkinum frá háttarlagi kongadømisins, og skrivaði *tað* í eina bók, og legði *hana* niðurfyri frammi fyri HARRANUM. Og Sámuel sendi alt fólkið avstað, hvønn mann til húsar síns.
26 ¶ Og Saul eisini fór heim til Gī-bē´-ūh; og tað fór við honum eitt lið av monnum, hvørs hjørtu Guð hevði nomið við.
27 Men Bē´-lī-ăl-s børn søgdu, Hvussu skal hesin maðurin frelsa okkum? Og teir vanvirdu hann, og bóru honum ongar gávur. Men hann helt friði sínum.

KAPITUL 11

TÁ kom Náhasj Ammoniti upp, og leiraðist ímóti Já´-bĕsj-gī´-lē-ăd: og allir menninir úr Já´-bĕsj søgdu við Náhasj, Ger ein sáttmála við okkum, og vit vilja tæna tær.
2 Og Náhasj Ammoniti svaraði teimum, Við hesi *treyt* vil eg gera *ein sáttmála* við tykkum, at eg má stoyta út øll høgru eygu tykkara, og leggja tað *til* eina vanæru uppá alt Ísrael.
3 Og teir elstu av Já´-bĕsj søgdu við hann, Gev okkum sjey daga frest, at vit mega senda sendiboðar at øllum breddum Ísraels: og tá, um *tað veri* eingin maður at frelsa okkum, vilja vit koma út til tín.
4 ¶ Tá komu sendiboðarnir til Gī-bē´-ūh Sauls, og taldu tíðindini í oyru fólksins: og alt fólkið lyfti upp røddum sínum, og grætt.
5 Og sí, Saul kom aftaná stórfæafylginum uttan av akrinum; og Saul segði, Hvat *bagir* fólkinum, at teir gráta? Og teir taldu honum tíðindini hjá monnunum úr Já´-bĕsj.

6 Og Andi Guðs kom uppá Saul, tá ið hann hoyrdi hasi tíðindini, og hansara firtni varð kynd stórligani.

7 Og hann tók eitt ok av oksum, og høgdi teir í stykkir, og sendi *tey* út gjøgnum allar breddarnar av Ísrael við hondunum á sendiboðunum, sigandi, Hvørsumhelst *ið* kemur ikki fram aftaná Sauli og aftaná Sámueli, soleiðis skal tað verða gjørt innat oksum hans. Og HARRANS ótti fell á fólkið, og teir komu út ēinmælt.

8 Og tá ið hann upptaldi teir í Bĕ´-zĕk, vóru børn Ísraels trý hundrað túsund, og menninir av Judah tríati túsund.

9 Og teir søgdu við sendiboðarnar, sum komu, Svá skulu tit siga við menninar úr Já´-bĕsj-gĭ´-lĕ-ăd, Í morgin, við *ta tíðina sum* sólin verði heit, skulu tit hava hjálp. Og sendiboðarnir komu og sýndu *tað* fyri monnunum úr Já´-bĕsj; og teir vórðu glaðir.

10 Menninir úr Já´-bĕsj tessvegna søgdu, Í morgin vilja vit koma út at tykkum, og tit skulu gera við okkum alt sum tykist gott yvirfyri tykkum.

11 Og tað varð *so* á morgindeginum, at Saul stillaði fólkið í tríggjar flokkar; og teir komu inn í miðjuna av herliðinum í morgunvøkuni, og vógu Ammonitarnar inntil hita dagsins: og tað bar á, at teir, sum vóru eftir, vórðu spjaddir, so at tveir av teimum vóru ikki eftir saman.

12 ¶ Og fólkið segði við Sámuel, Hvør *er* hann sum segði, Skal Saul ríkja yvir okkum? kom við monnunum, at vit mega taka teir av lívi.

13 Og Saul segði, Tað skal ikki maður verða tikin av lívi henda dag: tí í dag hevur HARRIN virkað frelsu í Ísrael.

14 Tá segði Sámuel til fólksins, Komið, og latum okkum fara til Gĭl´-găl, og endurnýggja kongadømið har.

15 Og alt fólkið fór til Gĭl´-găl; og har gjørdu teir Saul *til* kong frammi fyri HARRANUM í Gĭl´-găl; og har sláturofraðu teir friðofra˘sláturoffur˘ frammi fyri HARRANUM; og har stórliga fegnaðust Saul og allir menn Ísraels.

KAPITUL 12

OG Sámuel segði við allan Ísrael, Sí, eg havi lýtt á rødd tykkara í øllum sum tit søgdu við meg, og havi gjørt kong yvir tykkum.

2 Og nú, sí, kongurin gongur frammi fyri tykkum: og eg eri gamal og gráhærdur; og sí, synir mínir *eru* hjá tykkum: og eg havi gingið frammi fyri tykkum frá mínum barndómi at hesum degi.

3 Sí, her *eri* eg: vitnið ímóti mær frammi fyri HARRANUM, og frammi fyri salvaða hans: hvørs oksa havi eg tikið? ella hvørs asna havi eg tikið? ella hvønn havi eg snýtt? hvønn havi eg kúgað? ella av hvørs hond havi eg móttikið *nakað* mutur til at blinda míni eygu harvið? og eg vil endurbøta tykkum tað.

4 Og teir søgdu, Tú hevurt ikki snýtt okkum, ella kúgað okkum, eiheldur hevurt tú tikið nakað av nakars mans hond.

5 Og hann segði við teir, HARRIN *er* vitni ímóti tykkum, og hansara salvaði *er* vitni henda dag, at tit hava ikki funnið nakað í hond míni. Og teir svaraðu, *Hann er* vitni.

6 ¶ Og Sámuel segði við fólkið, *Tað er* HARRIN sum førdi fram Móses og Aaron, og sum førdi tykkara fedrar upp út úr Egyptalandi.

7 Nú tessvegna, standið stillir, at eg má røða við tykkum frammi fyri HARRANUM um allar HARRANS

rættvísu gerðir, sum hann gjørdi mót tykkum og mót fedrum tykkara.

8 Tá ið Jákob var komin inn í Egyptaland, og tykkara fedrar róptu á HARRAN, tá sendi HARRIN Móses og Aaron, sum førdu fram tykkara fedrar út úr Egyptalandi, og fekk teir at dvøljast í hesum plássi.

9 Og tá ið teir gloymdu HARRAN Guð sín, seldi hann teir inn í hondina á Sí·sĕ·ră, høvuðsmanni av herliði Hă·zôr·s, og inn í hondina á Philistunum, og inn í hondina á kongi Móabs, og teir bardust ímóti teimum.

10 Og teir róptu á HARRAN, og søgdu, Vit hava syndað, av tí at vit hava yvirgivið HARRAN, og hava tænt Bă·ă·lim og Ăsj·tă·rōth: men nú, útfría okkum út úr hondini á okkara fíggindum, og vit vilja tæna tær.

11 Og HARRIN sendi Jĕr·ŭb·bă·ăl, og Bĕ·dăn, og Jĕph·thăh, og Sámuel, og útfríaði tykkum út úr hondini á tykkara fíggindum á hvørjari síðu, og tit búðu tryggir.

12 Og tá ið tit sóu, at Náhasj, kongurin av børnum Ammons, kom ímóti tykkum, søgdu tit við meg, Nei; men ein kongur skal ríkja yvir okkum: tá ið HARRIN Guð tykkara *var* kongur tykkara.

13 Nú tessvegna, sjáið kongin, hvønn tit hava kosið, *og* hvønn tit hava tráað! og sí, HARRIN hevur sett ein kong yvir tykkum.

14 Um tit vilji óttast HARRAN, og tæna honum, og lýða rødd hansara, og ei gera uppreist ímóti boði HARRANS, tá skulu bæði tit og eisini kongurin, sum ríkir yvir tykkum, halda áfram at fylgja HARRANUM Guði tykkara:

15 Men um tit vilji ikki lýða rødd HARRANS, men geri uppreist ímóti boði HARRANS, tá skal hond HARRANS vera ímóti tykkum, eins og *hon var* ímóti fedrum tykkara.

16 ¶ Nú tessvegna, standið og síggið hetta mikla ting, sum HARRIN vil gera frammi fyri eygum tykkara.

17 *Er tað* ikki hveitiheyst í dag? Eg vil kalla at HARRANUM, og hann skal senda toru og regn; at tit mega varnast og síggja, at tykkara vondska *er* mikil, sum tit hava gjørt í eygsjón HARRANS, í at umbiðja tykkum ein kong.

18 So Sámuel kallaði at HARRANUM; og HARRIN sendi toru og regn tann dagin: og alt fólkið stórliga óttaðist HARRAN og Sámuel.

19 Og alt fólkið segði við Sámuel, Bið fyri tænarum tínum at HARRANUM Guði tínum, at vit doyggi ei: tí at vit hava lagt afturat øllum okkara syndum *hetta* illa, at umbiðja okkum ein kong.

20 ¶ Og Sámuel segði við fólkið, Óttist ikki: tit hava gjørt alla hesa vondsku: tó vendið ikki til viks frá at fylgja HARRANUM, men tænið HARRANUM við øllum hjarta tykkara;

21 Og vendið tit ikki til viks: tí at *tá skuldu tit farið* eftir fáfongdum *tingum,* sum ei kunnu gagna ella útfría; tí at tey *eru* fáfongd.

22 Tí at HARRIN vil ikki yvirgeva fólk sítt fyri mikla navns síns skuld: av tí at tað hevur toknað HARRANUM at gera tykkum *til* fólk sítt.

23 Harafturat, hvat mær viðvíkur, Guð sýti *fyri,* at eg skuldi syndað ímóti HARRANUM, í at givist at biðja fyri tykkum: men eg vil læra tykkum hin góða og hin rætta veg:

24 Einans óttist HARRAN, og tænið honum í sannleika við øllum hjarta tykkara: tí at umhugsið hvussu miklar *lutir* hann hevur gjørt fyri tykkum.

25 Men um tit skulu enn gera vondliga, skulu tit verða upptærdir, bæði tit og kongur tykkara.

KAPITUL 13

SAUL ríkti ēitt ár; og tá ið hann hevði ríkt tvey ár yvir Ísrael,

2 Valdi Saul sær trý túsund *menn* av Ísrael; *hvarav* tvey túsund vóru við Sauli í Mīch′-măsj og á Beth-el fjalli, og eitt túsund vóru við Jónathani í Gī-bē′-ŭh Benjamins: og restina av fólkinum sendi hann, hvønn mann til tjalds síns.

3 Og Jónathan sló setuliðið hjá Philistunum, sum *var* í Gē′-bă, og Philistarnir hoyrdu *harum*. Og Saul blásti lúðurin út gjøgnum alt landið, sigandi, Lat Hebrēararnar hoyra.

4 Og alt Ísrael hoyrdi sagt, *at* Saul hevði sligið eitt setulið hjá Philistunum, og *at* Ísrael eisini varð hildið í andstygd hjá Philistunum. Og fólkið varð kallað saman aftaná Sauli til Gĭl′găl.

5 ¶ Og Philistarnir savnaðu seg saman at berjast við Ísrael, tríati túsund vagnar, og seks túsund hestmenn, og fólk sum sandurin sum *er* á sævarstrondini í fjøldleika: og teir komu upp, og slógu upp í Mīch′-măsj, eystanvert frá Bĕth-ā′-vĕn.

6 Tá ið menninir av Ísrael sóu, at teir vóru í eini trong*støðu*, (tí at fólkini vóru neyðstaddir,) tá fjaldi fólkið seg í hellum, og í kjarrum, og í klettum, og í høgum plássum, og í holum.

7 Og *summir av* Hebrēarunum fóru yvirum Jordan til land Gáds og Gileads. Hvat Sauli viðvíkur, hann *var* enn í Gĭl′găl, og alt fólkið fylgdi honum skelvandi.

8 ¶ Og hann drálaði sjey dagar, samsvarandi við ta settu tíðina sum Sámuel *hevði ásett:* men Sámuel kom ikki til Gĭl′găl; og fólkini vórðu spjaddir frá honum.

9 Og Saul segði, Før higar eitt brennioffur til mín, og friðoffur˘. Og hann ofraði brenniofrið.

10 Og tað bar á, at so skjótt sum hann hevði lokið við at ofra brenniofrið, sí, Sámuel kom; og Saul fór út at møta honum, at hann mátti heilsað honum.

11 ¶ Og Sámuel segði, Hvat hevurt tú gjørt? Og Saul segði, Av tí at eg sá, at fólkið vóru spjaddir frá mær, og *at* tú komst ikki innanfyri dagarnar ásettu, og *at* Philistarnir savnaðu seg saman í Mīch′-măsj;

12 Tí segði eg, Philistarnir vilja koma oman nú uppá meg til Gĭl′găl, og eg havi ikki gjørt umbøning at HARRANUM: eg tvingaði meg sjálvan tessvegna, og ofraði eitt brennioffur.

13 Og Sámuel segði til Sauls, Tú hevurt gjørt fávitskuliganí: tú hevurt ikki hildið boðið hjá HARRANUM Guði tínum, sum hann ábeyð tær: tí at nú vildi HARRIN havt grundfest kongadømi títt uppiá Ísrael um ævir.

14 Men nú skal títt kongadømi ikki halda áfram: HARRIN hevur søkt sær ein mann eftir egna hjarta sínum, og HARRIN hevur áboðið honum *at vera* høvuðsmaður yvir fólki sínum, av tí at tú hevurt ikki hildið *tað* sum HARRIN ábeyð tær.

15 Og Sámuel reistist, og kom sær upp frá Gĭl′găl at Gī-bē′-ŭh Benjamins. Og Saul upptaldi fólkið *sum vóru* tilstaðar hjá honum, umleið seks hundrað menn.

16 Og Saul, og Jónathan sonur hansara, og fólkið *sum vóru* tilstaðar hjá teimum, vórðu *verandi* í Gī-bē′-ŭh Benjamins: men Philistarnir leiraðust í Mīch′-măsj.

17 ¶ Og rænararnir komu út úr leirinum hjá Philistunum í trimum flokkum: ēin flokkur vendi at veginum *sum leiðir til* Ŏph′-răh, at landi Sjū′-ăl-s:

18 Og ein annar flokkur vendi vegin *til* Bĕth-hór´-ōn: og ein annar flokkur vendi *til* vegin av landamarkinum sum horvir móti Zē´-bŏ-ĭm-s dalinum ímóti oyðuni.

19 ¶ Nú, tað fanst eingin smiður út gjøgnum alt land Ísraels: tí at Philistararnir søgdu, At ikki Hebrēararnir geri *sær* svørð˘ ella spjót˘:

20 Men allir Ísraelitarnir fóru oman til Philistarnar, at brýna hvør maður haka sín, og plógjarn sítt, og øks sína, og hakkara sín.

21 Tó høvdu teir eina fíl til hakkararnar, og til plógjørnini, og til kvíslirnar, og til øksirnar, og at hvessa píkstavirnar.

22 So tað hendi á bardagadeginum, at tað fanst hvørki svørð, ella spjót, í hondini á nøkrum av fólkinum sum *vóru* við Sauli og Jónathani: men hjá Sauli og hjá Jónathani, syni hansara, fanst tað.

23 Og setuliðið hjá Philistunum fór út til yvirfaring Mīch´-măsj.

KAPITUL 14

NÚ, tað bar á uppá ein dag, at Jónathan Sauls sonur segði við tann unga mannin sum bar brynju hansara, Kom, og latum okkum fara yvir til setuliðið hjá Philistunum, sum *er* hīnumegin. Men hann segði ikki faðir sínum frá.

2 Men Saul dvaldi í tí ytsta partinum av Gĭ-bē´-ŭh undir einum granateplatræi, sum *er* í Mĭg´-rŏn: og fólkið, sum *vóru* við honum, *vóru* umleið seks hundrað menn;

3 Og Á´-hĭ-ăh, sonur Á´-hĭ-tŭb-s, bróðir Ĭ´-chă-bŏd-s, sonur Phĭ´-nĕhăs-ar, sonar Ē´-lī-s, prests HARRANS í Sjī´-lôh, ílatin eina ê-phōd´-u. Og fólkið vitsti ikki, at Jónathan var farin.

4 ¶ Og ímillum yvirfaringarnar, eftir hvørjum Jónathan royndi at fara yvirum at setuliðinum hjá Philistunum, *var* ein hvassur klettur ēinumegin, og ein hvassur klettur hīnumegin: og navnið á tí ēina *var* Bó´-zēz, og navnið á hīnum Sĕn´-ēh.

5 Tað frammarligasta av tí ēina *var* staðsett norðanfyri, yvir av Mīch´-măsj, og hīn sunnanfyri, yvir av Gĭ-bē´-ŭh.

6 Og Jónathan segði til unga mannin, sum bar brynju hansara, Kom, og latum okkum fara yvir at setuliðinum hjá hesum óumskornu: tað kann vera, at HARRIN vilji virka fyri okkum: tí at *tað er* eingin forðan hjá HARRANUM at frelsa við mongum ella við fáum.

7 Og hansara brynjuberi segði við hann, Ger alt sum *er* í hjarta tínum: vend tær; sí, eg *eri* við tær, samsvarandi við hjarta títt.

8 Tá segði Jónathan, Sí, vit vilja fara yvir at *hesum* monnunum, og vit vilja avhylja okkum sjálvar at teimum.

9 Um teir sigi soleiðis við okkum, Steðgið, inntil vit koma til tykkara; tá vilja vit standa stillir í plássi okkara, og vilja ikki fara niðan at teimum.

10 Men um teir sigi soleiðis, Komið niðan at okkum; tá vilja vit fara niðan: tí at HARRIN hevur flýggjað teir inn í hond okkara: og hetta *skal vera* eitt tekin hjá okkum.

11 Og báðir av teimum avhuldu seg sjálvar yvirfyri setuliðinum hjá Philistunum: og Philistarnir søgdu, Sí, Hebrēararnir koma fram út úr holunum, har teir høvdu fjalt seg.

12 Og menninir av setuliðinum svaraðu Jónathani og brynjubera hansara, og søgdu, Komið upp til okkara, og vit vilja vísa tykkum eitt ting. Og Jónathan segði við brynjubera sín, Kom upp aftaná mær: tí at HARRIN hevur flýggjað teir inn í hond Ísraels.

13 Og Jónathan kleyv niðan

uppiá hondum sínum og uppiá fótum sínum, og hansara brynjuberi eftir honum: og teir fullu frammi fyri Jónathani; og hansara brynjuberi vá aftaná honum.

14 Og hatta fyrsta slátrið, sum Jónathan og brynjuberi hansara gjørdu, var umleið tjúgu menn; innanfyri sum var tað ein hálvan akur av landi, *sum* eitt ok *av oksum kundu pløgt*.

15 Og tað var nøtran í herliðinum, í akrinum, og millum alt fólkið: setuliðið, og rænararnir, teir eisini nøtraðu, og jørðin skalv: so har var ein sera mikil nøtran.

16 Og varðmenninir hjá Sauli í Gī-bē´-ūh Benjamins hugdu; og sí, fjøldin smeltaði burtur, og teir hildu áfram at berja niður *hvønn annan*.

17 Tá segði Saul við fólkið sum *vóru* við honum, Uppteljið nú, og síggið hvør er farin frá okkum. Og tá ið teir høvdu upptalt, sí, Jónathan og brynjuberi hansara *vóru* ikki *har*.

18 Og Saul segði við Á-hī-āh, Før higar ørk Guðs. Tí at ørk Guðs var á teirri tíð hjá børnum Ísraels.

19 ¶ Og tað bar á, meðan Saul talaði við prestarnar, at ljóðið, sum *var* í herliðinum hjá Philistunum, helt áfram og øktist: og Saul segði við prestin, Drag aftur hond tína.

20 Og Saul, og alt fólkið sum *vóru* við honum, savnaðu seg, og teir komu til bardagan: og sí, hvørs mans svørð var ímóti felaga hansara, *og har var* ein sera mikil hurlivasi.

21 Harafturat Hebrēararnir *sum* vóru við Philistunum áðrenn ta tíðina, sum fóru upp við teimum inn í leirin *frá landinum* rundan um, enntá teir eisini *vendu til tess* at vera við Ísraelitunum sum *vóru* við Sauli og Jónathani.

22 Somuleiðis allir menninir av Ísrael sum høvdu fjalt seg á Ē-phrā-īm fjalli, *tá ið* teir hoyrdu, at Philistarnir flýddu, enntá teir eisini fylgdu hart aftaná teimum í bardaganum.

23 So HARRIN bjargaði Ísrael tann dagin: og bardagin fór yvir at Bēth-ā´-vēn.

24 ¶ Og menninir av Ísrael vóru neyðstaddir tann dagin: tí at Saul hevði eiðsvorið fólkið, sigandi, Bannaður *veri* tann maður, sum etur *nakran* mat inntil aftan, at eg má verða hevndur á fíggindar mínar. So eingin av fólkinum smakkaði *nakran* mat.

25 Og allir *teir av* landinum komu til ein skóg; og har var hunangur uppiá jørðini.

26 Og tá ið fólkið vóru komnir inn í skógin, sí, hunangurin dreyp; men eingin maður setti hond sína til munn sín: tí at fólkið óttaðist eiðin.

27 Men Jónathan hoyrdi ikki tá ið faðir hansara álegði fólkið við eiðinum: hvørsvegna hann setti fram endan á stavinum, sum *var* í hond hansara, og dyppaði hann í eina hunangskøku, og setti hond sína til munn sín; og eygu hansara vórðu upplýsnað.

28 Tá svaraði ēin av fólkinum, og segði, Tín faðir strangligani álegði fólkinum við einum eiði, sigandi, Bannaður *veri* tann maður, sum etur *nakran* mat henda dag. Og fólkið var ørmaktað.

29 Tá segði Jónathan, Faðir mín hevur órógvað landið: síggið, eg biði tykkum, hvussu eygu míni eru vorðin upplýsnað, av tí at eg smakkaði eitt sindur av hesum hunanginum.

30 Hvør mikið meira, um so vildi til, *at* fólkið hevði etið frælsliga í dag av fongi fígginda sína, sum teir funnu? tí hevði tað ikki verið nú ein nógv størri slátran millum Philistanna?

31 Og teir slógu Philistarnar tann dagin frá Mīch´-măsj til Aĭ´-jălōn: og fólkið var sera ørmaktað.
32 Og fólkið fleyg uppá ránsfæið, og tók seyð, og oksar, og kálvar, og vógu *teir* á jørðini: og fólkið át *teir* við blóðinum.
33 ¶ Tá søgdu teir Sauli frá, sigandi, Sí, fólkið syndar ímóti HARRANUM, í at teir eta við blóðinum. Og hann segði, Tit hava misbrotist: rullið ein miklan stein at mær henda dag.
34 Og Saul segði, Spreiðið tykkum millum fólksins, og sigið við teir, Førið mær higar hvør maður oksa sín, og hvør maður seyð sín, og vegið *teir* her, og etið; og syndið ikki ímóti HARRANUM í at eta við blóðinum. Og alt fólkið førdi hvør maður oksa sín við sær tað kvøldið, og vógu *teir* har.
35 Og Saul bygdi eitt altar at HARRANUM: tað sama var tað fyrsta altarið sum hann bygdi at HARRANUM.
36 ¶ Og Saul segði, Latum okkum fara oman eftir Philistunum um nátt*ina*, og herja teir inntil morgunljósið, og latum okkum ikki eftirlata ein mann av teimum. Og teir søgdu, Ger hvatsumhelst *ið* tykir gott at tær. Tá segði presturin, Latum okkum nærkast higar at Guði.
37 Og Saul spurdi *um* ráð av Guði, Skal eg fara oman eftir Philistunum? vilt tú flýggja teir inn í hond Ísraels? Men hann svaraði honum ikki tann dagin.
38 Og Saul segði, Nærkist tit higar, allir teir fremstu av fólkinum: og skynið og síggið, hvarí henda synd hevur verðið henda dag.
39 Tí at, *sum* HARRIN livir, sum frelsir Ísrael, tó *at* tað veri í Jónathani, syni mínum, skal hann vissuliga doyggja. Men *tað var* ikki maður millum alt fólkið, *sum* svaraði honum.
40 Tá segði hann við alt Ísrael, Verið tit á ēinari síðu, og eg og Jónathan, sonur mín, vilja vera á hīnari síðuni. Og fólkið segði við Saul, Ger hvat tær tykir gott.
41 Tí segði Saul við HARRAN Guð Ísraels, Gev ein fullkomnan *lut*. Og Saul og Jónathan vórðu tiknir: men fólkið komst undan.
42 Og Saul segði, Kastið *lutir* ímillum meg og Jónathan, son mín. Og Jónathan varð tikin.
43 Tá segði Saul til Jónathans, Sig mær hvat tú hevurt gjørt. Og Jónathan taldi honum, og segði, Eg bert smakkaði eitt sindur av hunangi við endanum á stavinum sum *var* í hond míni, *og* sí, eg má doyggja.
44 Og Saul svaraði, Guð geri soleiðis og meira við: tí at tú skalt vissuliga doyggja, Jónathan.
45 Og fólkið segði við Saul, Skal Jónathan doyggja, sum hevur virkað hesa miklu frelsu í Ísrael? Guð sýti *fyri: sum* HARRIN livir, tað skal ikki ēitt hár av høvdi hansara falla til jarðarinnar; tí at hann hevur virkað við Guði henda dag. So fólkið bjargaði Jónathani, at hann doyði ikki.
46 Tá fór Saul niðan frá at fylgja Philistunum: og Philistarnir fóru til egna pláss sítt.
47 ¶ So Saul tók kongadømið yvir Ísrael, og bardist ímóti øllum figgindum sínum á hvørjari síðu, ímóti Móab, og ímóti Ammons børnum, og ímóti Ē´-dóm, og ímóti kongunum av Zō´-băh og ímóti Philistunum: og hvagarsumhelst *ið* hann vendi sær, nívdi hann *teir*.
48 Og hann savnaði eitt herlið, og sló Â-măl-ēk-īt´-arnar, og útfríaði Ísrael út úr hondunum á teimum sum rændu teir.
49 Nú, synirnir hjá Sauli vóru Jónathan, og Ĭsj´-ū-ī, og Mĕl´-chī-sjû´-ă: og nøvnini hjá døtrum hansara tveim *vóru hesi;* navnið

hjá hini fyrstuføddu Mĕ′-răb, og navnið hjá hini yngru Michal:

50 Og navnið hjá ektakonu Sauls *var* Ă-hĭn′-ō-ăm, dóttir Ă-hĭ′-mă-ăz-ar: og navnið hjá høvuðsmanninum av herliði hansara *var* Abner, sonur Nêrs, faðirbróður Sauls.

51 Og Kisj *var* faðir Sauls; og Nêr, faðir Abners, *var* sonur Ā′-bĭ-ĕl-s.

52 Og tað var svárt kríggj ímóti Philistunum allar dagar Sauls: og tá ið Saul sá onkran sterkan mann, ella onkran reystan mann, tók hann hann at sær.

KAPITUL 15

SÁMUEL eisini segði við Saul, HARRIN sendi meg at salva teg *til at vera* kong yvir fólki sínum, yvir Ísrael: nú tessvegna, lýð tú á røddina á orðunum hjá HARRANUM.

2 Svá sigur HARRI herliðanna, Meg minnist *tað* sum Ā′-mâ-lĕk gjørdi við Ísrael, hvussu hann lá *á lúri* eftir honum á veginum, tá ið hann kom upp frá Egyptalandi.

3 Nú, far og slá Ā′-mâ-lĕk, og aldeilis oyð alt sum teir hava, og eir teimum ikki; men bana bæði manni og kvinnu, pinkubarni og bróstabarni, oksa og seyði, kameli og asna.

4 Og Saul savnaði fólkið saman, og upptaldi teir í Tĕ′-lâ-ím, tvey hundrað túsund fótmenn, og tíggju túsund menn av Judah.

5 Og Saul kom til ein stað av Ā′-mâ-lĕk, og lá á lúri í dalinum.

6 ¶ Og Saul segði við Kē-nĭt′-arnar, Farið, víkið, sleppið tykkum oman burturúr Â-măl-ĕk-ĭt′-unum, at ikki eg oyði tykkum við teimum: tí at tit sýndu blídni móti øllum børnum Ísraels, tá ið teir komu upp út úr Egyptalandi. So Kē-nĭt′-arnir fóru avstað burturúr Â-măl-ĕk-ĭt′-unum.

7 Og Saul sló Â-măl-ĕk-ĭt′-arnar frá Hă′-vī-lăh *inntil* tú kemurt til Sjūr, sum *er* yvir ímóti Egyptalandi.

8 Og hann tók Ágag, kong Â-măl-ĕk-ĭt′-anna, livandi, og aldeilis oyddi alt fólkið við svørðseggini.

9 Men Saul og fólkið spardu Ágag, og tað besta av seyðinum, og av oksunum, og av gøðingunum, og lombunum, og alt *sum var* gott, og vildu ikki aldeilis oyða tey: men alt *sum var* ringt og vrak*bart,* tað oyddu teir aldeilis.

10 ¶ Tá kom orð HARRANS at Sámueli, sigandi,

11 Tað iðrar meg, at eg havi sett upp Saul *til at vera* kong: tí at hann er vendur tilbakar frá at fylgja mær, og hevur ikki útført boðini hjá mær. Og tað harmaði Sámuel; og hann rópti á HARRAN alla nátt.

12 Og tá ið Sámuel reis árla at møta Sauli um morgunin, varð tað sagt Sámueli, sigandi, Saul kom til Carmel, og sí, hann setti sær upp eitt pláss, og er farin umkring, og farin áfram, og farin oman til Gĭl′-găl.

13 Og Sámuel kom til Sauls: og Saul segði við hann, Vælsignaður *veri* tú av HARRANUM: eg havi útført boðið hjá HARRANUM.

14 Og Sámuel segði, Hvat *merkir* tá hendan jarman av seyðinum í oyrum mínum, og beljanin av oksunum sum eg hoyri?

15 Og Saul segði, Teir hava ført teir frá Â-măl-ĕk-ĭt′-unum: tí at fólkið spardi tað besta av seyðinum og av oksunum, at sláturofra at HARRANUM Guði tínum; og restina hava vit aldeilis oytt.

16 Tá segði Sámuel við Saul, Steðga, og eg vil siga tær hvat HARRIN hevur sagt til mín hesa nátt. Og hann segði við hann, Sig áfram.

17 Og Sámuel segði, Tá ið tú *vart* lítil í tíni egnu eygsjón, *varðst* tú ikki *gjørdur til* høvdið hjá ættargreinum Ísraels, og HARRIN salvaði teg *til* kong yvir Ísrael?
18 Og HARRIN sendi teg á eina ferð, og segði, Far og aldeilis oyð syndararnar, Á-măl-ĕk-ĭt´-ar-nar, og berst ímóti teimum, inntil teir verði uppslúkaðir.
19 Hvørsvegna tá lýddirt tú ikki rødd HARRANS, men fleygst uppá ránsfæið, og gjørdirt ilt í eygsjón HARRANS?
20 Og Saul segði við Sámuel, Jú, eg havi lýtt rødd HARRANS, og havi farið vegin sum HARRIN sendi meg, og havi ført Ágag, kongin av Ă´-mâ-lĕk, og havi aldeilis oytt Á-măl-ĕk-ĭt´-arnar.
21 Men fólkið tók av ránsfæinum, seyð og oksar; tað fremsta av tingunum sum skuldu havt verðið aldeilis oydd, til at sláturofra at HARRANUM Guði tínum í Gĭl´-găl.
22 Og Sámuel segði, Hevur HARRIN *eins mikla* fragd í brenniofrum og sláturofrum, sum í at lýða rødd HARRANS? Sí, at lýða *er* betri enn sláturoffur, *og* at geva gætur enn feittið av veðrum.
23 Tí at uppreistur *er sum* heksakunst-syndin, og treiskni *er sum* misgerð og avgudadýrkan. Av tí at tú hevurt havnað orði HARRANS, hann eisini hevur havnað tær frá *at vera* kongur.
24 ¶ Og Saul segði við Sámuel, Eg havi syndað: tí at eg havi misbrotið boðið hjá HARRANUM, og orð tíni: av tí at eg óttaðist fólkið, og aktaði rødd teirra.
25 Nú tessvegna, eg biði teg, náða synd mína, og vend aftur við mær, at eg má tilbiðja HARRAN.
26 Og Sámuel segði við Saul, Eg vil ikki venda aftur við tær: tí at tú hevurt havnað orði HARRANS, og HARRIN hevur havnað tær frá at vera kongur yvir Ísrael.
27 Og sum Sámuel vendi umkring til at fara avstað, legði hann hald uppá skeytið á kappa hansara, og hann skrædnaði.
28 Og Sámuel segði við hann, HARRIN hevur skrætt kongadømi Ísraels frá tær henda dag, og hevur givið tað til ein næsta hjá tær, *sum er* betri enn tú.
29 Og eisini Styrki Ísraels vil ikki lúgva ella iðrast: tí at hann *er* ikki ein maður, at hann skuldi iðrast.
30 Tá segði hann, Eg havi syndað: *tó* æra meg nú, eg biði teg, frammi fyri hinum elstu av fólki mínum, og frammi fyri Ísrael, og vend aftur við mær, at eg má tilbiðja HARRAN Guð tín.
31 So Sámuel vendi aftur aftaná Sauli; og Saul tilbað HARRAN.
32 ¶ Tá segði Sámuel, Førið tit higar til mín Ágag, kong Á-măl-ĕk-ĭt´-anna. Og Ágag kom at honum lystiliga. Og Ágag segði, Vissuliga er beiskleiki deyðans umliðin.
33 Og Sámuel segði, Eins og svørð títt hevur gjørt kvinnur barnleysar, soleiðis skal móðir tín verða barnleys millum kvenna. Og Sámuel høgdi Ágag í stykkir frammi fyri HARRANUM í Gĭl´-găl.
34 ¶ So fór Sámuel til Rá´-măh; og Saul fór upp til húsar síns til Gĭ-bē´-ŭh Sauls.
35 Og Sámuel kom ei meira at síggja Saul inntil dag deyða síns: hóast hetta, Sámuel harmaðist yvir Saul: og HARRIN iðraðist, at hann hevði gjørt Saul *til* kong yvir Ísrael.

KAPITUL 16

OG HARRIN segði við Sámuel, Hvussu leingi vilt tú harmast yvir Saul, við tað *at* eg havi havnað honum frá at ríkja yvir Ísrael? fyll horn títt við olju, og far, eg vil senda teg til Ísai Beth-lehemitan-s: tí at eg havi skaffað mær ein kong millum sona hans.

2 Og Sámuel segði, Hvussu kann eg fara? um Saul hoyri *tað,* vil hann drepa meg. Og HARRIN segði, Tak eina kvígu við tær, og sig, Eg eri komin at sláturofra til HARRANS.

3 Og kalla Ísai til sláturofringina, og eg vil sýna tær hvat tú skalt gera: og tú skalt salva mær *hann* sum eg nevni tær.

4 Og Sámuel gjørdi tað sum HARRIN talaði, og kom til Beth-lehem. Og teir elstu úr býinum nøtraðu við komu hansara, og søgdu, Kemurt tú friðsamliga?

5 Og hann segði, Friðsamliga: eg eri komin til *tess* at sláturofra at HARRANUM: halgið tykkum, og komið við mær til sláturofringina. Og hann halgaði Ísai og synir hansara, og kallaði teir til sláturofringina.

6 ¶ Og tað bar á, tá ið teir vóru komnir, at hann hugdi á Ē´-lī-ăb, og segði, Vissuliga, hin salvaði HARRANS *er* frammi fyri honum.

7 Men HARRIN segði við Sámuel, Hygg ikki eftir ásjón hansara, ella á hæddina á vakstrarlagi hansara; av tí at eg havi havnað honum: tí at *HARRIN sær* ikki sum maður sær; tí at maður hyggur á ta útvortis útsjóndina, men HARRIN hyggur á hjartað.

8 Tá kallaði Ísai Ă-bīn´-ă-dăb, og læt hann fara yvir frammi fyri Sámueli. Og hann segði, Eiheldur hevur HARRIN valt hendan.

9 So fekk Ísai Sjăm´-măh at fara framvið. Og hann segði, Eiheldur hevur HARRIN valt hendan.

10 Aftur fekk Ísai sjey av sonum sínum at fara yvir frammi fyri Sámueli. Og Sámuel segði við Ísai, HARRIN hevur ikki valt hesar.

11 Og Sámuel segði við Ísai, Eru her øll børn *tíni?* Og hann segði, Tað er eftir enn hin yngsti, og sí, hann goymir at seyðinum. Og Sámuel segði við Ísai, Send og heinta hann: tí at vit vilja ikki setast niður, til hann komi higar.

12 Og hann sendi, og førdi hann inn. Nú, hann *var* reyðdæmdur, *og* hartil av eini fagrari ásjón, og frálíkur at hyggja til. Og HARRIN segði, Reis *teg,* salva hann: tí at hesin *er* hann.

13 Tá tók Sámuel hornið av olju, og salvaði hann í miðjum bróðrum hansara: og Andi HARRANS kom uppá Dávid frá tí degi frameftir. So Sámuel reis upp, og fór til Rá´-măh.

14 ¶ Men Andi HARRANS veik frá Sauli, og ein illur andi frá HARRANUM órógvaði hann.

15 Og tænarin hjá Sauli segði við hann, Sí nú, ein illur andi frá Guði órógvar teg.

16 Lat harra okkara nú skipa tænarum tínum, *sum eru* frammi fyri tær, at finna fram ein mann, *sum er* ein hegnigur spælari á eina harpu: og tað skal bera á, tá ið tann illi andin frá Guði er uppiá tær, at hann skal spæla við hond síni, og tær skal vera væl *statt.*

17 Og Saul segði við tænarar sínar, Skaffið mær nú ein mann, sum dugir *at* spæla væl, og førið *hann* til mín.

18 Tá svaraði ēin av tænarunum, og segði, Sí, eg havi sæð ein son hjá Ísai, Beth-lehemitanum, *sum er* hegnigur í at spæla, og ein mektigur reystur maður, og ein krígsmaður, og skynsamur í málevnum, og ein tekkiligur persónur, og HARRIN *er* við honum.

19 ¶ Hvørsvegna Saul sendi sendiboðar at Ísai, og segði, Send mær Dávid, son tín, sum *er* hjá seyðinum.

20 Og Ísai tók ein asna *løddan* við breyði, og ein kík av víni, og eitt geitarlamb, og sendi *tey* við Dávidi, syni sínum, at Sauli.

21 Og Dávid kom til Sauls, og stóð frammi fyri honum: og hann elskaði hann stórliga; og hann gjørdist brynjuberi hansara.
22 Og Saul sendi til Ísais, sigandi, Lat Dávid, eg biði teg, standa frammi fyri mær; tí at hann hevur funnið tokka í eygsjón míni.
23 Og tað bar á, tá ið tann *illi* andin frá Guði var uppiá Sauli, at Dávid tók eina hørpu, og spældi við hond síni: so Saul varð endurfriskaður, og *honum* vitsti væl við, og tann illi andin veik frá honum.

KAPITUL 17

NÚ, Philistarnir savnaðu saman herar sínar til bardaga, og vóru savnaðir saman við Sjō-chōh, sum *hoyrir* til Judah, og slógu upp ímillum Sjō-chōh og Ā-zē-kāh, í Ē-phĕs-dăm-mīn.
2 Og Saul og menninir av Ísrael vóru savnaðir saman, og slógu upp við Ē-lăh dalin, og stillaðu bardagan í uppstilling ímóti Philistunum.
3 Og Philistarnir stóðu á einum fjalli á tí ēinu síðuni, og Ísrael stóð á einum fjalli á hīnari síðuni: og *tað var* ein dalur ímillum teir.
4 ¶ Og tað fór út ein kappi út úr leirinum hjá Philistunum, nevndur Gō-lî-ăth, úr Gáth, hvørs hædd *var* seks alnir og eina sponn.
5 Og *hann hevði* ein hjálm av messing uppiá høvdi sínum, og hann *var* brynjaður við einum spangakoti; og vektin á kotinum *var* fimm túsund sjē-kl-ar av messing.
6 Og *hann hevði* leggjabrynjur av messing uppiá leggjum sínum, og ein smáskjøldur av messing ímillum akslar sínar.
7 Og stongin av spjóti hansara *var* líka *sum* ein vevsbummur; og hansara spjótshøvd *vigaði* seks hundrað sjē-kl-ar av jarni: og ēin, berandi ein skjøldur, fór undan honum.
8 Og hann stóð og geylaði at herunum av Ísrael, og segði við teir, Hví eru tit komnir út at stilla bardagan hjá *tykkum* í uppstilling? *eri* ikki eg ein Philisti, og tit tænarar fyri Sauli? veljið tykkum ein mann fyri tykkum, og latið hann koma oman til mín.
9 Um hann veri førur fyri at berjast við meg, og at drepa meg, tá vilja vit vera tænarar tykkara: men um eg havi yvirvág ímóti honum, og drepi hann, tá skulu tit vera tænarar okkara, og tæna okkum.
10 Og Philistin segði, Eg trossi herarnar av Ísrael henda dag; gevið mær ein mann, at vit mega berjast saman.
11 Tá ið Saul og allur Ísrael hoyrdu hasi orðini hjá Philistanum, vórðu teir mótfalnir, og stórliga bangnir.
12 ¶ Nú, Dávid *var* sonurin hjá tí Ēph-ră-thīt-anum úr Bethlehem-judah, hvørs navn *var* Ísai; og hann hevði átta synir: og maðurin fór manna millum *sum* ein gamalur maður á døgum Sauls.
13 Og teir tríggir elstu synirnir hjá Ísai fóru *og* fylgdu Sauli til bardagan: og nøvnini hjá hansara trimum sonum, sum fóru til bardagan, *vóru* Ē-lî-āb hin frumborni, og næst honum Ă-bīn-ă-dăb, og hin triðji Sjăm-măh.
14 Og Dávid *var* hin yngsti: og teir tríggir elstu fylgdu Sauli.
15 Men Dávid fór og vendi aftur frá Sauli at føða seyðin hjá faðir sínum í Beth-lehem.
16 Og Philistin nærkaðist morgun og kvøld, og framstillaði seg sjálvan fjøruti dagar.
17 Og Ísai segði við Dávid, son sín, Tak nú til brøður tínar eina ē-phŭh av hesum svidna *korni,*

og hesi tíggju heilbreyðini, og renn til leirin til brøðra tína;
18 Og ber hesar tíggju ostarnar at høvuðsmanninum av *teirra* túsund; og hygg hvussu brøðrum tínum gongst, og tak pant teirra.
19 Nú Saul, og teir, og allir menninir av Ísrael, *vóru* í Ē′-lăh dali, *og* bardust við Philistarnar.
20 ¶ Og Dávid reis upp árla um morgunin, og eftirlæt seyðin hjá″ einum passara, og tók, og fór, eins og Ísai hevði boðið honum; og hann kom til skotgrøvina, sum herliðið fór fram til kampin, og rópaðu fyri bardaganum.
21 Tí at Ísrael og Philistarnir høvdu stillað bardagan í uppstilling, her ímóti heri.
22 Og Dávid eftirlæt viðførning sín í hondini á viðførningspassaranum, og rann inn í herin, og kom og heilsaði brøðrum sínum.
23 Og sum hann talaði við teir, sí, har kom upp kappin, Philistin úr Gáth, Gō′-lî-ăth at navni, út úr herunum hjá Philistunum, og talaði samsvarandi við hini somu orðini: og Dávid hoyrdi *tey*.
24 Og allir menninir av Ísrael, tá ið teir sóu mannin, flýddu frá honum, og vóru sára ræddir.
25 Og menninir av Ísrael søgdu, Hava tit sæð henda mannin, sum er komin upp? vissuliga til at trossa Ísrael er hann komin upp: og tað skal verða, *at* tann maður, sum drepur hann, kongurin vil uppríka hann við miklum ríkidømum, og vil geva honum dóttur sína, og gera hús faðirs hansara frítt í Ísrael.
26 Og Dávid talaði til menninar, sum stóðu hjá honum, sigandi, Hvat skal verða gjørt við tann mann sum drepur hendan Philistan, og tekur burtur vanæruna frá Ísrael? tí at hvør *er* hesin óumskorni Philistin, at hann skuldi trossað herar hins livandi Guðs?
27 Og fólkið svaraði honum eftir hesum háttarlagi, sigandi, Soleiðis skal tað verða gjørt við tann mann sum drepur hann.
28 ¶ Og Ē′-lî-ăb, elsti bróðir hansara, hoyrdi tá ið hann talaði við menninar; og firtni Ē′-lî-ăb-s varð kynd ímóti Dávidi, og hann segði, Hví komst tú oman higar? og hjá hvørjum hevurt tú eftirlatið hasar fáu seyðirnar í oyðuni? eg kenni hugmóð tína, og óargaligleika hjarta tíns; tí at tú ert komin oman, at tú máttirt síggja bardagan.
29 Og Dávid segði, Hvat havi eg nú gjørt? *Er* ikki ein grund?
30 ¶ Og hann vendi frá honum ímóti einum øðrum, og talaði eftir hinum sama háttarlagi: og fólkið svaraði honum aftur eftir hinum fyrra háttarlagi.
31 Og tá ið orðini vórðu hoyrd, sum Dávid talaði, fóru teir yvir *tey* aftur frammi fyri Sauli: og hann sendi eftir honum.
32 ¶ Og Dávid segði til Sauls, Lat hjartað hjá ongum manni bila uppá grund av honum; tín tænari vil fara og berjast við hendan Philistan.
33 Og Saul segði til Dávids, Tú ert ikki førur fyri at fara ímóti hesum Philistanum til at berjast við hann: tí at tú *ert bert* ein unglingi, og hann ein krígsmaður frá ungdómi sínum.
34 Og Dávid segði við Saul, Tín tænari goymdi at seyðinum hjá faðir sínum, og tað kom ein leyva, og ein bjørn, og tók eitt lamb úr fylginum:
35 Og eg fór út eftir honum, og sló hann, og útfríaði *tað* út úr munni hansara: og tá ið hann reistist ímóti mær, fangaði eg *hann* eftir skeggi hans, og sló hann, og vó hann.

36 Tín tænari vó bæði leyvu
og bjørnina: og hesin óumskorni
Philisti skal verða eins og ēin
av teimum, eftirsum *at* hann
hevur trossað herar hins livandi
Guðs.
37 Dávid segði harafturat,
HARRIN, sum útfríaði meg út úr
labbanum á leyvuni, og út úr
labbanum á bjørnini, hann vil
útfría meg út úr hondini á hesum Philista. Og Saul segði við
Dávid, Far, og HARRIN veri við
tær.
38 ¶ Og Saul herklæddi Dávid
við brynju síni, og hann setti ein
hjálm av messing á høvur hansara; hann eisini herklæddi hann
við einum spangakoti.
39 Og Dávid gyrdi svørð sítt
uppá herklæðir síni, og hann vitaði at ganga; tí at hann hevði ikki
roynt *tey*. Og Dávid segði við
Saul, Eg kann ikki fara við hesum˘; tí at eg havi ikki roynt *tey*.
Og Dávid koyrdi tey av sær.
40 Og hann tók stav sín í hond
sína, og valdi sær fimm mjúkar
steinar úr áarløkinum, og koyrdi
teir í eina hirðatasku sum hann
hevði, enntá í ein pjøka; og hansara sleingja *var* í hond hansara:
og hann nærkaðist til Philistan.
41 Og Philistin kom áfram og
nærkaðist at Dávidi; og maðurin,
sum bar skjøldurin, *fór* frammanfyri honum.
42 Og tá ið Philistin hugdi umkring, og sá Dávid, vanvirdi hann
hann: tí at hann var *bert* ein unglingi, og reyðdæmdur, og av eini
fríðari ásjón.
43 Og Philistin segði við Dávid,
Eri eg ein hundur, at tú kemurt
til mín við stavum? Og Philistin
bannaði Dávid við gudar sínar.
44 Og Philistin segði til Dávids, Kom til mín, og eg vil geva
kjøt títt at fuglum luftarinnar, og
til villdjór˘ akursins.
45 Tá segði Dávid til Philistans, Tú kemurt til mín við einum svørði, og við einum spjóti,
og við einum skjøldri: men eg
komi til tín í navni HARRA herliðanna, Guð˘ hjá herum Ísraels,
hvønn tú hevurt trossað.
46 Henda dag vil HARRIN flýggja teg inn í hond mína; og eg
vil sláa teg, og taka høvd títt frá
tær; og eg vil geva ræini av herliði
Philistanna at fuglum luftarinnar
henda dag, og til jarðarinnar villu
villdjór; at øll jørðin má vita, at
tað er ein Guð í Ísrael.
47 Og allur hesin savnaður skal
vita, at HARRIN frelsir ikki við
svørði og spjóti: tí at bardagin *er*
HARRANS, og hann vil geva tykkum inn í hendur okkara.
48 Og tað bar á, tá ið Philistin
reistist, og kom og nærkaðist til
at møta Dávidi, at Dávid skundaði *sær,* og rann ímóti herinum at
møta Philistanum.
49 Og Dávid koyrdi hond sína
í taskuna hjá sær, og tók haðani
ein stein, og slongdi *hann,* og sló
Philistan í enni hansara, at steinurin sakk inn í enni hansara; og
hann fell uppá andlit sítt til jarðarinnar.
50 So Dávid hevði yvirvág yvir
Philistanum við eini sleingju og
við einum steini, og sló Philistan,
og vó hann; men *tað var* einkið
svørð í hond Dávids.
51 Dávid tessvegna rann, og
stóð uppiá Philistanum, og tók
svørð hansara, og dró tað út úr
slíðranum harhjá, og vó hann, og
skar av høvur hans harvið. Og tá
ið Philistarnir sóu, *at* kappi teirra
var deyður, flýddu teir.
52 Og menninir av Ísrael og av
Judah reistust, og geltu, og eltu
Philistarnar, inntil tú komi til
dalin, og til portrini av Ēk´rōn.
Og teir særdu hjá Philistunum
fullu niður eftir veginum til Sjāă-rā´-ĭm, enntá at Gáth, og at Ēk´rōn.

53 Og børn Ísraels vendu aftur frá at elta eftir Philistunum, og teir rændu tjøld teirra.

54 Og Dávid tók høvdið á Philistanum, og kom við tí til Jerusalem; men hann koyrdi herklæðir hansara í tjald sítt.

55 ¶ Og tá ið Saul sá Dávid fara fram ímóti Philistanum, segði hann við Abner, høvuðsmannin av herliðinum, Abner, hvørs sonur *er* hesin unglingin? Og Abner segði, *Sum* sál tín livir, O kongur, eg dugi ikki *at* siga.

56 Og kongur segði, Fregna tú, hvørs sonur slintrið *er*.

57 Og sum Dávid kom aftur frá slátringini av Philistanum, tók Abner hann, og førdi hann framfyri Saul við høvdinum á Philistanum í hond síni.

58 Og Saul segði til hansara, Hvørs sonur *ert* tú, *tú* ungi maður? Og Dávid svaraði, *Eg eri* sonur tænara tíns Ísais, Beth-lehemitan-s.

KAPITUL 18

OG tað bar á, tá ið hann hevði lokið við at tala við Saul, at sál Jónathans varð knýtt *saman* við sál Dávids, og Jónathan elskaði hann sum sína egnu sál.

2 Og Saul tók hann tann dagin, og vildi ikki meira lata hann fara heim til húsar faðirs hansara.

3 Tá gjørdu Jónathan og Dávid ein sáttmála, av tí at hann elskaði hann sum sína egnu sál.

4 Og Jónathan berkaði seg fyri skikkjuna sum *var* uppiá honum, og gav hana til Dávids, og klæðir síni, enntá til svørð sítt, og til boga sín, og til girðil sín.

5 ¶ Og Dávid fór út, hvagarsumhelst *ið* Saul sendi hann, *og* háttaði sær vísliga: og Saul setti hann yvir krígsmonnunum, og hann varð góðtikin í eygsjónini hjá øllum fólkinum, og eisini í eygsjónini á tænarum Sauls.

6 Og tað bar á, sum teir komu, tá ið Dávid var komin aftur frá slátringini av Philistanum, at kvinnurnar komu út úr øllum staðunum av Ísrael, syngjandi og dansandi, at møta kong Sauli, við tamburínum, við frøi, og við tónleiks-ljóðførum.

7 Og kvinnurnar svaraðu *hvørji aðrari,* sum tær spældu, og søgdu, Saul hevur vigið sínar túsundir, og Dávid sínar tíggju túsundir.

8 Og Saul varð sera vreiður, og framsøgnin mistoknaði honum; og hann segði, Tær hava tilskrivað Dávidi tíggju túsundir, og til mín tær hava tilskrivað *bert* túsundir: og *hvat* kann hann hava meira, uttan kongadømið?

9 Og Saul *hevði ringt* eyga á Dávidi frá tí degi og frameftir.

10 ¶ Og tað hendi á morgindeginum, at tann illi andin frá Guði kom uppá Saul, og hann propheteraði í miðjum húsinum: og Dávid spældi við hond síni, eins og til aðrar tíðir: og *tað var* eitt kastispjót í hendi Sauls.

11 Og Saul kastaði kastispjótið; tí at hann segði, Eg vil sláa Dávid enntá til veggin *við tí*. Og Dávid forðaði *sær* úr nærveru hansara tværreisur.

12 ¶ Og Saul var ræddur fyri Dávidi, av tí at HARRIN var við honum, og var vikin frá Sauli.

13 Saul tessvegna burtflutti hann frá sær, og gjørdi hann *til* høvuðsmann sín yvir túsund; og hann fór út og kom inn frammanfyri fólkinum.

14 Og Dávid háttaði sær vísliga á øllum vegum sínum; og HARRIN *var* við honum.

15 Hvørsvegna tá ið Saul sá, at hann háttaði sær sera vísliga, varð hann ræddur fyri honum.

16 Men alt Ísrael og Judah elskaðu Dávid, av tí at hann fór út og kom inn undan teimum.

17 ¶ Og Saul segði til Dávids, Sí mína eldru dóttur Mē′-răb, hana vil eg geva tær til ektakonu: einans vert tú reystur fyri meg, og berst HARRANS bardagar. Tí at Saul segði, Lat ikki hond mína vera uppiá honum, men lat hondina hjá Philistunum vera uppiá honum.

18 Og Dávid segði við Saul, Hvør *eri* eg? og hvat *er* lív mítt, *ella* familja faðirs míns í Ísrael, at eg skuldi verið versonur til kongin?

19 Men tað bar á um ta tíðina tá ið Mē′-răb, dóttir Sauls, skuldi havt verðið givin til Dávids, at hon varð givin Ā′-drī-ĕl-i Mē-hó-lă-thīt′-a til ektakonu.

20 Og Michal, dóttir Sauls, elskaði Dávid: og tey søgdu Sauli frá, og tað tingið toknaði honum.

21 Og Saul segði, Eg vil geva honum hana, at hon má vera ein snerra fyri honum, og at hondin á Philistunum má vera ímóti honum. Hvørsvegna Saul segði til Dávids, Tú skalt henda dag vera versonur mín í *teirri ēinu* teirra tveggja.

22 ¶ Og Saul skipaði tænarum sínum, *sigandi,* Samtalið við Dávid loyniliga, og sigið, Sí, kongurin hevur fragd í tær, og allir tænararnir hjá honum elska teg: nú tessvegna, ver versonur kongsins.

23 Og tænararnir hjá Sauli talaðu tey orðini í oyruni á Dávidi. Og Dávid segði, Tykir tað fyri tykkum *eitt* lætt*isligt ting* at vera versonurin hjá einum kongi, við tað at eg *eri* ein fátækur maður, og lætt*is*liga mettur?

24 Og tænararnir hjá Sauli søgdu honum frá, sigandi, Á henda hátt talaði Dávid.

25 Og Saul segði, Svá skulu tit siga til Dávids, Kongurin tráar ikki nakran mund, uttan hundrað forhúðir hjá Philistunum, til *tess* at verða hevndur á fíggindar kongsins. Men Saul hugsaði at fáa Dávid *at* falla við hondini á Philistunum.

26 Og tá ið tænarar hansara søgdu Dávidi hesi orð, líkaði tað Dávidi væl at vera versonur kongsins: og dagarnir vóru ikki útrunnir.

27 Hvørsvegna Dávid reistist og fór, hann og menn hansara, og vógu av Philistunum tvey hundrað menn; og Dávid kom við forhúðum teirra, og teir góvu tær í fullum tali til kongsins, at hann mátti vera versonur kongsins. Og Saul gav honum Michal, dóttur sína, til ektakonu.

28 ¶ Og Saul sá og vitsti, at HARRIN *var* við Dávidi, og *at* Michal, dóttir Sauls, elskaði hann.

29 Og Saul var uppaftur meira ræddur fyri Dávidi; og Saul gjørdist fíggindi Dávids áframhaldandi.

30 Tá fóru fúrstarnir hjá Philistunum út: og tað bar á, eftir at teir fóru út, *at* Dávid háttaði sær meiri vísliga enn allir tænarar Sauls; so at navn hansara varð nógv hildið um.

KAPITUL 19

OG Saul talaði til Jónathans, sonar síns, og til alra tænara sína, at teir skuldu drepa Dávid.

2 Men Jónathan, sonur Sauls, fragdaðist nógv í Dávidi: og Jónathan segði Dávidi frá, sigandi, Saul, faðir mín, roynir at drepa teg: nú tessvegna, eg biði teg, ansa eftir tær inntil morgunin, og verð í einum loyniligum *plássi,* og fjal teg:

3 Og eg vil fara út og standa við síðuna av faðir mínum í akrinum, har tú *ert,* og eg vil samtala við faðir mín um teg; og tað *sum* eg síggi, tað vil eg siga tær.

4 ¶ Og Jónathan talaði gott um Dávid yvirfyri Sauli, faðir sínum, og segði við hann, Lat ikki kong synda ímóti tænara sínum, ímóti Dávidi; av tí at hann hevur ikki syndað ímóti tær, og av tí at hansara verk *hava verið* mótvegis tær sera góð:

5 Tí at hann setti lív sítt í hond sína, og vó Philistan, og HARRIN virkaði eina mikla frelsu fyri allan Ísrael: tú sást *tað,* og fegnaðirst: hvørsvegna vilt tú tá synda ímóti sakleysum blóði, at vega Dávid uttan grund?

6 Og Saul gav gætur at røddini hjá Jónathani: og Saul svór, *Sum* HARRIN livir, hann skal ei verða vigin.

7 Og Jónathan kallaði Dávid, og Jónathan sýndi honum allar hasar lutir. Og Jónathan førdi Dávid til Sauls, og hann var í nærveru hansara, sum í lidnum tíðum.

8 ¶ Og tað varð kríggj aftur: og Dávid fór út, og bardist við Philistarnar, og vá teir við eini miklari slátran; og teir flýggjaðu frá honum.

9 Og hin illi andin frá HARRANUM var uppiá Sauli, sum hann sat í húsi sínum við kastispjóti sínum í hond síni: og Dávid spældi við hond *síni.*

10 Og Saul søkti at sláa Dávid enntá til veggin við kastispjótinum; men hann smeyg avstað úr nærveru Sauls, og hann sló kastispjótið inn í veggin: og Dávid flýddi, og komst undan ta náttina.

11 Saul eisini sendi sendiboðar at húsi Dávids, at vakta hann, og at vega hann um morgunin: og Michal, ektakona Dávids, segði honum frá, sigandi, Um tú frelsi ikki lív títt í nátt, skalt tú verða vigin í morgin.

12 ¶ So Michal seyg Dávid niður ígjøgnum ein glugga: og hann fór, og flýddi, og komst undan.

13 Og Michal tók eina *stand*mynd, og legði *hana* í songina, og legði ein kodda av geita*hári* til høvdalag hansara, og dekkaði *hana* við einum klæði.

14 Og tá ið Saul sendi sendiboðar at taka Dávid, segði hon, Hann *er* sjúkur.

15 Og Saul sendi sendiboðarnar *aftur* at síggja Dávid, sigandi, Førið hann niðan til mín í songini, at eg má vega hann.

16 Og tá ið sendiboðarnir vóru komnir inn, sí, *tað var* ein *stand*mynd í songini, við einum kodda av geita*hári* til høvdalag hans.

17 Og Saul segði við Michal, Hví hevurt tú svikið meg so, og sent avstað fígginda mín, at hann hevur komist undan? Og Michal svaraði Sauli, Hann segði við meg, Lat meg fara; hví skuldi eg dripið teg?

18 ¶ So Dávid flýddi, og komst undan, og kom til Sámuels til Rá´-măh, og segði honum alt sum Saul hevði gjørt við hann. Og hann og Sámuel fóru og dvaldust í Năï´-ōth.

19 Og tað varð sagt Sauli frá, sigandi, Sí, Dávid *er* í Năï´-ōth í Rá´-măh.

20 Og Saul sendi sendiboðar at taka Dávid: og tá ið teir sóu flokkin av prophetunum propheterandi, og Sámuel standandi *sum* útnevndur yvir teimum, var Andi Guðs uppiá sendiboðum Sauls, og teir eisini propheteraðu.

21 Og tá ið tað varð sagt Sauli, sendi hann aðrar sendiboðar, og teir propheteraðu somuleiðis. Og Saul sendi sendiboðar aftur triðju ferðina, og teir propheteraðu eisini.

22 Tá fór hann eisini til Rá´-măh, og kom til ein miklan brunn, sum *er* í Sĕ´-chû: og hann spurdi og segði, Hvar *eru* Sámuel og Dávid? Og *ēin* segði, Sí, *teir veri seg* í Năï´-ōth í Rá´-măh.

23 Og hann fór hagar til Naï´-ōth í Rá´-măh: og Andi Guðs var uppiá honum eisini, og hann fór áfram, og propheteraði, inntil hann kom til Naï´-ōth í Rá´-măh.
24 Og hann skræddi av klæðir síni eisini, og propheteraði frammi fyri Sámueli á líkan hátt, og lá niðri nakin allan tann dagin og alla ta náttina. Hvørsvegna teir siga, *Er* Saul eisini millum prophetarnar?

KAPITUL 20

OG Dávid flýddi frá Naï´-ōth í Rá´-măh, og kom og segði frammi fyri Jónathani, Hvat havi eg gjørt? hvør *er* misgerð mín? og hvør *er* synd mín frammi fyri faðir tínum, at hann søkir mítt lív?
2 Og hann segði við hann, Guð sýti *fyri;* tú skalt ikki doyggja: sí, faðir mín vil einkið gera, hvørki stórt ella smátt, uttan at hann vil sýna tað mær: og hví skuldi faðir mín fjalt henda lut fyri mær? tað *er* ikki *soleiðis*.
3 Og Dávid svór harafturat, og segði, Tín faðir vissuliga veit, at eg havi funnið náði í eygum tínum; og hann sigur, Lat ikki Jónathan vita hetta, at ikki hann verði harmur: men sanniliga, *sum* HARRIN livir, og *sum* sál tín livir, *tað er* bert eitt fet ímillum meg og deyða.
4 Tá segði Jónathan við Dávid, Hvatsumhelst *ið* sál tín tráar, eg vil enntá gera *tað* fyri teg.
5 Og Dávid segði við Jónathan, Sí, í morgin *er* nýmánin, og eg skuldi ikki svitast at sitið við kongi til matar: men lat meg fara, at eg má fjala meg í akrinum at tí triðja *deginum* um aftan.
6 Um faðir tín yvirhøvur sakni meg, tá sig, Dávid inniliga umbað *loyvi* av mær, at hann mátti renna til Beth-lehem, staðar síns: tí at *tað er* eitt árligt sláturoffur har fyri alla familjuna.
7 Um hann sigi svá, *Tað er* gott; skal tænari tín hava frið: men um hann verði sera vreiður, *tá* ver vísur *í* at ilt er avrátt av honum.
8 Tí skalt tú fara blídligani við tænara tínum, tí at tú hevurt ført tænara tín inn í ein sáttmála HARRANS við teg: hóast hetta, um tað veri *seg* í mær misgerð, veg meg sjálvur, tí at hví skuldirt tú ført meg til faðirs tíns?
9 Og Jónathan segði, Fjart veri tað frá tær: tí at um eg vissuliga vitsti, at ilt var avrátt av faðir mínum at koma uppá teg, vildi eg tá ikki sagt tær tað?
10 Tá segði Dávid til Jónathans, Hvør skal siga mær? ella hvat *um* faðir tín svari tær knortlasliga?
11 ¶ Og Jónathan segði við Dávid, Kom, og lat okkum fara út á akurin. Og teir fóru út báðir av teimum á akurin.
12 Og Jónathan segði við Dávid, O HARRI Guð Ísraels, tá ið eg havi ljóðað faðir mín umkring í morgin onkuntíð, *ella* hin triðja *dagin,* og sí, *um tað veri seg* gott ímóti Dávidi, og eg tá sendi ikki at tær, og sýni tað tær;
13 HARRIN geri soleiðis og mikið meira við Jónathan: men um tað tokni faðir mínum *at gera* tær ilt, tá vil eg sýna tað tær, og senda teg avstað, at tú mást fara í friði: og HARRIN veri við tær, eins og hann hevur verið við faðir mínum.
14 Og tú skalt ikki einans meðan enn eg livi sýna mær blíðsemi HARRANS, at eg doyggi ikki:
15 Men *eisini* skalt tú ikki skera av blíðsemi tína frá húsi mínum um ævir: nei, ikki tá ið HARRIN hevur skorið av figgindar Dávids, hvønn *og* ēin, frá ásjón jarðarinnar.
16 So Jónathan gjørdi *ein sáttmála* við hús Dávids, *sigandi,* Lat HARRAN enntá krevja *tað* av hondini hjá figgindum Dávids.
17 Og Jónathan voldi Dávidi at

svørja aftur, av tí at hann elskaði hann: tí hann elskaði hann sum hann elskaði sína egnu sál.

18 Tá segði Jónathan til Dávids, Í morgin *er* nýmánin: og tú skalt verða saknaður, av tí at títt sæti vil vera tómt.

19 Og *tá ið* tú hevurt steðgað tríggjar dagar, *tá* skalt tú fara oman snarliga, og koma til plássið har tú fjaldirt teg, tá ið gerningurin var *í hond,* og skalt verða verandi við steinin Ë-zël.

20 Og eg vil skjóta tríggjar ørvar á síðuna *hará,* sum um eg skeyt eftir einum marki.

21 Og sí, eg vil senda ein pilt, *sigandi,* Far, finn fram ørvarnar. Um eg úttrykkiliga sigi við sveinin, Sí, ørvarnir *eru* hesumegin við teg, tak teir; tá komi tú: tí at *tað er* friður til tín, og einkið mein; *sum* HARRIN livir.

22 Men um eg sigi svá við tann unga mannin, Sí, ørvarnir *eru* handanfyri teg; *tá* far tín veg: tí at HARRIN hevur sent teg avstað.

23 Og *hvat viðvíkur* málinum, sum tú og eg hava talað um, sí, HARRIN *veri* ímillum teg og meg um ævir.

24 ¶ So Dávid fjaldi seg í akrinum: og tá ið nýmánin var komin, setti kongurin seg niður at eta mat.

25 Og kongurin sat uppiá sæti sínum, sum til aðrar tíðir, *enntá* uppiá einum sæti við veggin: og Jónathan reistist, og Abner sat við síðuna av Sauli, og plássið hjá Dávidi var tómt.

26 Hóast hetta, Saul talaði ikki nakað ting tann dagin: tí at hann hugsaði, Ókkurt hevur viðurfarið honum, hann *er* ikki reinur; vissuligani *er* hann ikki reinur.

27 Og tað hendi á morgindeginum, *sum var* hin annar *dagur* mánaðarins, at plássið hjá Dávidi var tómt: og Saul segði við Jónathan, son sín, Hvørsvegna kemur ikki sonur Ísais til matar, hvørki í gjár, ella í dag?

28 Og Jónathan svaraði Sauli, Dávid inniligani umbað *loyvi* av mær *at fara* til Beth-lehem:

29 Og hann segði, Lat meg fara, eg biði teg; tí at familja okkara hevur eitt sláturoffur í staðinum; og bróðir mín, hann hevur skipað mær *at vera har:* og nú, um eg havi funnið yndi í eygum tínum, lat meg sleppa avstað, eg biði teg, og síggja brøður mínar. Tí kemur hann ikki at borði kongs.

30 Tá varð vreiði Sauls kynd ímóti Jónathani, og hann segði við hann, Tú sonur at hini spiltu, uppreistrarsomu *kvinnu,* veit ikki eg, at tú hevurt valt son Ísais at tíni egnu ørkymlan, og ørkymlan nakni móður tínar?

31 Tí at so leingi sum sonur Ísais livir uppiá foldini, skalt tú ikki verða grundfestur, ella kongadømi títt. Hvørsvegna nú, send og heinta hann til mín, tí at hann skal vissuliga doyggja.

32 Og Jónathan svaraði Sauli, faðir sínum, og segði við hann, Hvørsvegna skal hann verða vigin? hvat hevur hann gjørt?

33 Og Saul kastaði eitt kastispjót eftir honum til at sláa hann: hvarvið Jónathan vitsti, at tað var avrátt av faðir sínum at vega Dávid.

34 So Jónathan reistist frá borði í grimmari firtni, og át ongan mat hin annan dagin av mánaðinum: tí at hann var harmur yvir Dávid, av tí at faðir hansara hevði gjørt honum skomm.

35 ¶ Og tað bar á um morgunin, at Jónathan fór út á akurin við hina ásettu tíð við Dávid, og ein lítil piltur við honum.

36 Og hann segði við pilt sín, Renn, finn fram nú ørvarnar sum eg skjóti. *Og* sum pilturin rann, skeyt hann eina ørv framum hann.

37 Og tá ið pilturin var komin til pláss ørvarinnar, sum Jónathan hevði skotið, rópaði Jónathan eftir piltinum, og segði, *Er* ikki ørvin handanfyri teg?

38 Og Jónathan rópti eftir piltinum, Ger skjótt, skunda *tær,* steðga ikki. Og pilturin hjá Jónathan savnaði upp ørvarnar, og kom til meistara síns.

39 Men pilturin vitsti ikki nakað ting: einans Jónathan og Dávid vitstu málið.

40 Og Jónathan gav skotvápnini hjá sær at pilti sínum, og segði við hann, Far, ber *tey* til staðarins.

41 ¶ *Og* so skjótt sum pilturin var farin, reistist Dávid úr *einum plássi* ímóti suðri, og fell á andlit sítt til jarðarinnar, og boygdi seg tríggjar ferðir: og teir kystu hvør annan, og grótu hvør við øðrum, inntil Dávid bar av.

42 Og Jónathan segði til Dávids, Far í friði, við tað at vit hava svorið, báðir av okkum, í navni HARRANS, sigandi, HARRIN veri ímillum meg og teg, og ímillum sáð mítt og sáð títt um ævir. Og hann reistist og fór avstað: og Jónathan fór inn í staðin.

KAPITUL 21

SÍÐAN kom Dávid til Nôb til Ă-hĭm´-ĕ-lĕch prests: og Ă-hĭm´-ĕ-lĕch varð ræddur við møtingina av Dávidi, og segði við hann, Hví *ert* tú einsamallur, og eingin maður við tær?

2 Og Dávid segði við Ă-hĭm´-ĕ-lĕch prest, Kongur hevur áboðið mær ein gerning, og hevur sagt við meg, Lat ongan mann vita nakað ting um gerningin, hvarum eg sendi teg, og hvat eg havi áboðið tær: og eg havi fyriskipað tænarar *mínar* til tað og tað staðið.

3 Nú tessvegna, hvat er undir hond tíni? gev *mær* fimm *heilbreyð* í hond mína, ella tað *sum* har er tilstaðar.

4 Og presturin svaraði Dávidi, og segði, *Tað er* einkið algongt breyð undir hond míni, men har er heilagt breyð; um teir ungu menninir havi hildið sær í øllum førum frá kvinnum.

5 Og Dávid svaraði prestinum, og segði við hann, Av sonnum *hava* kvinnur *verðið* hildnar frá okkum umleið hesar tríggjar dagarnar, síðan eg kom út, og kerini hjá teimum ungu monnunum eru heilag, og *breyðið er* á ein hátt algongt, ja, tó *at* tað varð halgað henda dag í kerinum.

6 So presturin gav honum halgað *breyð:* tí at tað var einkið breyð har, uttan sýnisbreyðið sum varð tikið frammanfyri ífrá HARRANUM, til at seta heitt breyð á tí degi tá ið tað varð tikið burtur.

7 Nú, ein ávísur maður av tænarum Sauls *var* har tann dagin, afturhildin frammi fyri HARRANUM; og hansara navn *var* Dó´-ĕg, ein Ē-dóm-ĭt´-i, hin fremsti av stórfæafylgismonnunum sum *hoyrdu* til Sauls.

8 ¶ Og Dávid segði við Ă-hĭm´-ĕ-lĕch, Og er ikki her undir hond tíni spjót ella svørð? tí at eg havi hvørki fært svørð mítt ella vápn míni við mær, av tí at gerningurin hjá kongi kravdi skund.

9 Og presturin segði, Svørðið hjá Gō´-lī-ăth-i Philista, hvønn tú vóst í Ē´-lăh dali, sí, tað *er her,* ballað í eitt klæði, aftanfyri ē-phōd´-una: um tú vilt taka tað, tak *tað:* tí at *tað er* einkið annað uttan tað her. Og Dávid segði, *Tað er* einkið líka *sum* tað; gev tað mær.

10 ¶ Og Dávid reistist, og flýddi tann dagin av ótta fyri Sauli, og fór til Á´-chĭsj, kongin av Gáth.

11 Og tænararnir hjá Á´-chĭsj

søgdu við hann, *Er* ikki hesin Dávid, kongur landsins? sungu tær ikki hvør fyri aðrari um hann í dansum, sigandi, Saul hevur vigið sínar túsundir, og Dávid sínar tíggju túsundir?

12 Og Dávid legði niðurfyri hesi orð í hjarta sínum, og var sára ræddur fyri Á-chīsj, kongi Gáths.

13 Og hann broytti atferð sína frammi fyri teimum, og lætst sum um hann *var* óður í hondum teirra, og skavaðist á portursdyrnum, og læt spýtt sítt falla niður uppá skegg sítt.

14 Tá segði Á-chīsj við tænarar sínar, Sí, tit síggja *at* maðurin er óður: hvørsvegna hava tit *tá* ført hann til mín?

15 Havi eg tørv á óðum monnum, at tit hava ført henda *felaga* til at spæla óði maðurin í nærveru míni? skal hesin *felagi* koma inn í hús mítt?

KAPITUL 22

DÁVID tessvegna fór avstað haðani, og komst undan til hellið Adullam: og tá ið brøður hansara, og alt hús faðirs hansara, hoyrdu *tað,* fóru teir oman hagar til hansara.

2 Og hvør tann *ið var* í neyð, og hvør tann ið *var* í skuld, og hvør tann *ið var* misnøgdaður, savnaðu seg at honum; og hann gjørdist ein høvuðsmaður yvir teimum: og tað vóru við honum umleið fýra hundrað menn.

3 ¶ Og Dávid fór haðani til Mīz-pēh Móabs: og hann segði við kongin av Móab, Lat faðir mín og móðir mína, eg biði teg, koma fram, *og vera* hjá tykkum, til eg veit hvat Guð vil gera fyri meg.

4 Og hann førdi tey framfyri kongin av Móab: og tey búðu hjá honum alla ta stund sum Dávid var í festninginum.

5 ¶ Og propheturin Gád segði við Dávid, Verð ikki í festninginum; far avstað, og slepp tær inn í land Judah. Tá fór Dávid avstað, og kom inn í skóg Hâr-ĕth-s.

6 ¶ Tá ið Saul hoyrdi, at Dávid var avdúkaður, og menninir sum við honum *vóru,* (nú, Saul varð í Gī-bē-ūh undir einum træi í Rá-măh, havandi spjót sítt í hond síni, og allir tænarar hansara stóðu kring hann;)

7 Tá segði Saul við tænarar sínar, sum stóðu kring hann, Hoyrið nú, tit Benjamitar; vil sonur Ísais geva hvørjum *og* ēinum av tykkum akrar og víngarðar, *og* gera tykkum allar *til* høvuðsmenn av túsundum, og høvuðsmenn av hundraðum;

8 At allir av tykkum hava samansvorið ímóti mær, og *tað er* eingin sum sýnir mær, at sonur mín hevur gjørt eitt bandalag við son Ísais, og *tað er* eingin av tykkum sum tekur synd í mær, ella sýnir mær, at sonur mín hevur rørt upp tænarar mínar ímóti mær, til at liggja á lúri, sum á hesum degi?

9 ¶ Tá svaraði Dó-ēg Ê-dómīt-i, sum var settur yvir tænarum Sauls, og segði, Eg sá son Ísais koma til Nôb, til Ă-hĭm-ĕ-lĕch-s Á-hī-tūb-s sonar.

10 Og hann fregnaði av HARRANUM fyri hann, og gav honum vistir, og gav honum svørðið hjá Gō-lī-ăth-i Philista.

11 Tá sendi kongur til at rópa Ă-hĭm-ĕ-lĕch prest, son Á-hī-tūb-s, og alt hús faðirs hansara, prestarnar sum *vóru* í Nôb: og teir komu allir av teimum til kongsins.

12 Og Saul segði, Hoyr nú, tú sonur Á-hī-tūb-s. Og hann svaraði, Her *eri* eg, harri mín.

13 Og Saul segði við hann, Hví hava tit samansvorið ímóti mær, tú og sonur Ísais, í at tú hevurt givið honum breyð, og eitt svørð,

og hevurt fregnað av Guði fyri hann, at hann skuldi rísa ímóti mær, til at liggja á lúri, sum á hesum degi?

14 Tá svaraði Ă-hĭm´-ĕ-lĕch kongi, og segði, Og hvør *er so* trúfastur millum alra tænara tína sum Dávid, sum er versonur kongs, og fer eftir ábjóðan tíni, og er heiðursamur í húsi tínum?

15 Byrjaði eg tá at fregnast av Guði fyri hann? fjart veri tað frá mær: lat ikki kong tilrokna tænara sínum *nakað* ting, *ella* til alt hús faðirs míns: tí at tænari tín vitsti einkið um alt hetta, minni ella meira.

16 Og kongur segði, Tú skalt vissuliga doyggja, Ă-hĭm´-ĕ-lĕch, tú, og alt hús faðirs tíns.

17 ¶ Og kongur segði við fótmenninar sum stóðu kring hann, Vendið, og vegið prestar HARRANS; av tí at hond teirra eisini *er* við Dávidi, og av tí at teir vitstu tá ið hann flýddi, og sýndu tað ikki fyri mær. Men tænarar kongsins vildu ikki seta fram hond sína til at falla uppá prestar HARRANS.

18 Og kongur segði til Dó´-ĕg-s, Vend tú, og fall uppá prestarnar. Og Dó´-ĕg Ê-dóm-ĭt´-i vendi, og hann fell uppá prestarnar, og vó á tí degi fýrsinstjúgu og fimm persónar, sum vóru í lín ê-phōd´-u.

19 Og Nôb, staðin hjá prestunum, sló hann við svørðeggini, bæði menn og kvinnur, børn og bróstabørn, og oksar, og asnar, og seyð, við svørðseggini.

20 ¶ Og ein av sonum Ă-hĭm´-ĕ-lĕch-s Á´-hĭ-tŭb-s sonar, nevndur Ā´-bĭ-ă-thâr, komst undan, og flýddi aftaná Dávidi.

21 Og Ā´-bĭ-ă-thâr sýndi Dávidi, at Saul hevði vigið prestar HARRANS.

22 Og Dávid segði við Ā´-bĭ-ă-thâr, Eg vitsti *tað* tann dagin, tá ið Dó´-ĕg Ê-dóm-ĭt´-i *var* har, at hann vildi vissuliga siga Sauli frá: eg havi gjørt høvi *til deyðan* hjá øllum persónunum av húsi faðirs tíns.

23 Verð tú hjá mær, óttast ikki: tí at hann, sum søkir lív mítt, søkir lív títt: men hjá mær *skalt* tú *vera* í trygdarverju.

KAPITUL 23

TÁ søgdu teir Dávidi frá, sigandi, Sí, Philistarnir berjast ímóti Kē-ī´-lăh, og teir ræna treskigólvini.

2 Dávid tessvegna fregnaði av HARRANUM, sigandi, Skal eg fara og sláa hesar Philistarnar? Og HARRIN segði við Dávid, Far, og slá Philistararnar, og frels Kē-ī´-lăh.

3 Og menninir hjá Dávidi søgdu við hann, Sí, vit veri ræddir her í Judah: hvør mikið meira tá, um vit komi til Kē-ī´-lăh ímóti herunum hjá Philistunum?

4 Tá fregnaði Dávid av HARRANUM uppaftur. Og HARRIN svaraði honum og segði, Reis *teg*, far oman til Kē-ī´-lăh; tí at eg vil flýggja Philistarnar inn í hond tína.

5 So Dávid og menn hansara fóru til Kē-ī´-lăh, og bardust við Philistarnar, og førdu burtur fenað teirra, og slógu teir við eini miklari slátran. So Dávid frelsti íbúgvar Kē-ī´-lăh.

6 Og tað bar á, tá ið Ā´-bĭ-ă-thâr Ă-hĭm´-ĕ-lĕch-s sonur flýddi til Dávids til Kē-ī´-lăh, *at* hann kom oman *við* eini ê-phōd´-u í hond síni.

7 ¶ Og tað varð sagt Sauli, at Dávid var komin til Kē-ī´-lăh. Og Saul segði, Guð hevur flýggjað hann inn í hond mína; tí at hann er lokaður inni, við at innfara inn í ein bý sum hevur portur˘ og stengur.

8 Og Saul kallaði alt fólkið saman til kríggj, at fara oman til Kē-ī´-lăh, til at kringseta Dávid og menn hansara.

9 ¶ Og Dávid vitsti, at Saul loyniliga íðkaði mein ímóti honum; og hann segði til Ā′-bĭ-ă-thâr-s prests, Før higar ê-phōd′-una.

10 Tá segði Dávid, O HARRI Guð Ísraels, tín tænari hevur vissuliga hoyrt, at Saul roynir at koma til Kē-ī′-lăh, at oyða staðin mína vegna.

11 Vilja menninir úr Kē-ī′-lăh flýggja meg upp inn í hond hansara? vil Saul koma oman, sum tænari tín hevur hoyrt? O HARRI Guð Ísraels, eg bøni teg, sig tænara tínum. Og HARRIN segði, Hann vil koma oman.

12 Tá segði Dávid, Vilja menninir úr Kē-ī′-lăh flýggja meg og menn mínar inn í hondina á Sauli? Og HARRIN segði, Teir vilja flýggja *teg* upp.

13 ¶ Tá reistust Dávid og menn hansara, *sum vóru* umleið seks hundrað, og fóru avstað úr Kē-ī′-lăh, og fóru hvagarsumhelst teir kundu fara. Og tað varð sagt Sauli, at Dávid hevði komist undan frá Kē-ī′-lăh; og hann lætti av at fara út.

14 Og Dávid varð í oyðuni í vígvirkjum, og varð verandi í einum fjalli í Ziphs oyðu. Og Saul søkti hann hvønn dag, men Guð flýggjaði hann ikki inn í hond hansara.

15 Og Dávid sá, at Saul var komin út at søkja lív sítt: og Dávid *var* í Ziphs oyðu í einum skógi.

16 ¶ Og Jónathan Sauls sonur reistist, og fór til Dávids inn í skógin, og styrkti hond hans í Guði.

17 Og hann segði við hann, Óttast ikki: tí at hond Sauls, faðirs míns, skal ikki finna teg; og tú skalt verða kongur yvir Ísrael, og eg skal vera næst tær; og tað eisini veit Saul, faðir mín.

18 Og teir tveir gjørdu ein sáttmála frammi fyri HARRANUM: og Dávid varð í skóginum, og Jónathan fór til húsar síns.

19 ¶ Tá komu upp Ziphitarnir til Sauls til Gĭ-bē′-ūh, sigandi, Fjalir ikki Dávid seg hjá okkum í vígvirkjum í skóginum, á heyggi Há′-chĭ-lăh, sum *er* sunnanfyri Jē′-sjĭ-mōn?

20 Nú tessvegna, O kongur, kom oman samsvarandi við alla trá sálar tínar at koma oman; og okkara partur *skal vera* at flýggja hann inn í hond kongsins.

21 Og Saul segði, Vælsignaðir *veri* tit av HARRANUM; tí at tit hava várkunn á meg.

22 Farið, eg biði tykkum, fyrireikið enn, og vitið og síggið pláss hansara, har hansara tilhald er, *og* hvør hevur sæð hann har: tí at tað er sagt mær, *at* hann ber *seg* sera sniðfundigani at.

23 Síggið tessvegna, og takið kunnleika um øll lúringarstøðini, har hann fjalir seg, og komið tit aftur til mín við vissuni, og eg vil fara við tykkum: og tað skal bera á, um hann veri í landinum, at eg vil leita hann upp út gjøgnum allar túsundirnar av Judah.

24 Og teir reistust, og fóru til Ziph undan Sauli: men Dávid og menn hansara *vóru* í Mā′-ŏn-s oyðu, í slættanum sunnanfyri Jē′-sjĭ-mōn.

25 Saul eisini og menn hansara fóru at søkja *hann*. Og teir søgdu Dávidi frá: hvørsvegna hann kom oman í ein klett, og varð í Mā′-ŏn-s oyðu. Og tá ið Saul hoyrdi *tað*, elti hann eftir Dávidi í Mā′-ŏn-s oyðu.

26 Og Saul fór hesumegin fjallið, og Dávid og menn hansara hasumegin fjallið: og Dávid gjørdi skjótt *av* at sleppa *sær* burtur, av ótta fyri Sauli; tí at Saul og menn hansara kringsettu Dávid og menn hansara runt umkring til at taka teir.

27 ¶ Men tað kom ein sendiboði at Sauli, sigandi, Skunda tær, og kom; tí at Philistarnir eru lopnir á landið.
28 Hvørsvegna Saul vendi aftur frá at elta eftir Dávidi, og fór ímóti Philistunum: tessvegna kallaðu teir tað plássið Sē´-lâ-hăm-mâh´-lē-kōth.
29 ¶ Og Dávid fór niðan haðani frá, og dvaldist í vígvirkjum í Ēn-gē´-dī.

KAPITUL 24

OG tað bar á, tá ið Saul var komin aftur frá at fylgja Philistunum, at tað varð sagt honum, sigandi, Sí, Dávid *er* í Ēn-gē´-dī-s oyðu.
2 Tá tók Saul trý túsund útvaldar menn úr øllum Ísrael, og fór at søkja Dávid og menn hansara uppiá klettum hinna villu geita.
3 Og hann kom til seyðabyrgini við vegin, har eitt helli *var;* og Saul fór inn at dekka føtur sínar: og Dávid og menn hansara vórðu verandi í síðunum av hellinum.
4 Og menninir hjá Dávidi søgdu við hann, Sí dagin, um hvønn HARRIN segði við teg, Sí, eg vil flýggja figginda tín inn í hond tína, at tú mást gera við hann sum tað skal tykjast gott at tær. Tá reistist Dávid, og skar av skeytið av skikkju Sauls loyniliga.
5 Og tað bar á aftaná, at Dávids hjarta sló hann, av tí at hann hevði skorið av skeyti Sauls.
6 Og hann segði við menn sínar, HARRIN sýti fyri, at eg skuldi gjørt hetta ting at meistara mínum, HARRANS salvaða, at rætta fram mína hond ímóti honum, við tað *at* hann *er* HARRANS salvaði.
7 So Dávid steðgaði tænarum sínum við hesum orðum, og loyvdi teimum ikki at rísa ímóti Sauli. Men Saul reis upp út úr hellinum, og fór *sín* veg.
8 Dávid eisini reistist aftaná, og fór út úr hellinum, og rópti eftir Sauli, sigandi, Mín harri, kongur. Og tá ið Saul hugdi afturum seg, heyk Dávid við andliti sínum til jarðarinnar, og boygdi seg.
9 ¶ Og Dávid segði til Sauls, Hví hoyrirt tú orðini hjá monnum, sigandi, Sí, Dávid søkir mein títt?
10 Sí, henda dag hava eygu tíni sæð, hvussu HARRIN hevði flýggjað teg í dag inn í hond mína í hellinum: og *summir* buðu *mær* drepa teg: men *eyga mítt* spardi teg; og eg segði, Eg vil ikki seta fram mína hond ímóti harra mínum; tí at hann *er* HARRANS salvaði.
11 Harafturat, faðir mín, síggj, ja, síggj skeytið av skikkju tíni í hond míni: tí at í at eg skar av skeytið á skikkju tíni, og drap teg ikki, viti tú og síggi, at *tað er* hvørki ilt, ella misbrot, í hond míni, og eg havi ikki syndað ímóti tær; tó veiðirt tú sál mína til at taka hana.
12 HARRIN dømi ímillum meg og teg, og HARRIN hevni meg á teg: men hond mín skal ikki vera uppiá tær.
13 Eins og sigur orðtak hinna fornu, Vondska útgongur frá hinum vondu: men hond mín skal ikki vera uppiá tær.
14 Eftir hvørjum er kongur Ísraels komin út? eftir hvørjum eltirt tú? eftir einum deyðum hundi, eftir eini loppu.
15 HARRIN tessvegna veri dómari, og dømi ímillum meg og teg, og síggi, og verji søk mína, og útfríi meg út úr hond tíni.
16 ¶ Og tað bar á, tá ið Dávid hevði lokið við at tala hesi orð við Saul, at Saul segði, *Er* hetta rødd tín, sonur mín Dávid? Og Saul lyfti upp rødd sína, og græt.
17 Og hann segði til Dávids, Tú *ert* meiri rættvísur enn eg: tí

at tú hevurt endurgoldið mær gott, hvar ið eg havi endurgoldið tær ilt.

18 Og tú hevurt sýnt henda dag, hvussu ið tú hevurt farið væl við mær: við tað at tá ið HARRIN hevði flýggjað meg inn í hond tína, drapst tú meg ikki.

19 Tí um maður finni fíggindа sín, vil hann lata hann fara væl avstað? hvørsvegna HARRIN endurgjaldi tær gott fyri tað *ið* tú hevurt gjørt mær henda dag.

20 Og nú, sí, eg veit væl, at tú skalt vissuliga verða kongur, og at kongadømi Ísraels skal verða grundfest í hond tíni.

21 Svør nú tessvegna at mær við HARRAN, at tú vilt ikki skera av sáð mítt eftir meg, og at tú vilt ikki oyða navn mítt úr húsi faðirs míns.

22 Og Dávid svór at Sauli. Og Saul fór heim; men Dávid og menn hansara sluppu sær niðan til vígvirkið.

KAPITUL 25

OG Sámuel doyði; og allir Ísraelitarnir vóru savnaðir saman, og harmaðu hann, og jarðaðu hann í húsi hans í Rámäh. Og Dávid reistist, og fór til Pár'ăn-s oyðu.

2 Og *tað var* ein maður í Mā'ŏn, hvørs ognir *vóru* í Carmel; og maðurin *var* sera mikil, og hann hevði trý túsund seyðir, og eitt túsund geitir: og hann klipti seyði sínum í Carmel.

3 Nú, navnið hjá manninum *var* Ná'băl; og navnið hjá konu hansara Ā'bī-gāīl: og *hon var* ein kvinna av góðum skili, og av eini vakrari ásjón: men maðurin *var* ónærisligur og óndur í gerningum sínum; og hann *var* av húsi Calebs.

4 ¶ Og Dávid hoyrdi í oyðuni, at Ná'băl klipti seyði sínum.

5 Og Dávid sendi út tíggju ungar menn, og Dávid segði við teir ungu menninar, Sleppið tykkum niðan til Carmel, og farið til Ná'băl-s, og heilsið honum í navni mínum:

6 Og svá skulu tit siga til hansara sum livir *í framgongd*, Friður *veri* bæði til tín, og friður *veri* til húsar tíns, og friður *veri* at øllum sum tú hevurt.

7 Og nú, eg havi hoyrt, at tú hevurt klipparar: nú, hirðar tínir, sum vóru við okkum, vit skaddu teir ikki, eiheldur var nakað vantandi teimum alla ta stund teir vóru í Carmel.

8 Spyr tínar ungu menn, og teir vilja sýna tær. Hvørsvegna, lat teir ungu menninar finna vælvilja í eygum tínum: tí at vit koma í einum góðum degi: gev, eg biði teg, hvatsumhelst *ið* kemur til handa tína at tænarum tínum, og til sonar tíns Dávids.

9 Og tá ið Dávids ungu menn komu, talaðu teir til Ná'băl-s samsvarandi við øll hasi orðini, í navni Dávids, og góvust.

10 ¶ Og Ná'băl svaraði tænarum Dávids, og segði, Hvør *er* Dávid? og hvør *er* sonur Ísais? tað veri mangir tænarar nú á døgum, sum bróta burtur, hvør maður frá meistara sínum.

11 Skal eg tá taka breyð mítt, og vatn mítt, og kjøt mítt, sum eg havi dripið til klipparar mínar, og geva *tað* innat monnum, sum eg veit ikki hvaðan teir *veri seg?*

12 So Dávids ungu menn vendu veg sín, og fóru aftur, og komu og søgdu honum allar tær framsagnirnar.

13 Og Dávid segði við menn sínar, Gyrðið tit á hvør maður svørð sítt. Og teir gyrdu á hvør maður svørð sítt; og Dávid eisini gyrdi á svørð sítt: og tað fóru upp aftaná Dávidi umleið fýra hundrað menn; og tvey hundrað vórðu hjá tingunum.

14 ¶ Men ēin av teimum ungu monnunum segði Ā´-bĭ-gâĭl-i, konu Ná´-băl-s, frá, sigandi, Sí, Dávid sendi sendiboðar út úr oyðuni at heilsa meistara várum; og hann skeldaði á teir.

15 Men menninir *vóru* sera góðir at okkum, og vit vórðu ikki skaddir, eiheldur mistu vit nakað ting, so leingi sum vit vóru í umgongni við teir, tá ið vit vóru í akrunum:

16 Teir vóru ein veggur at okkum, bæði um nátt*ina* og *um* dag*in;* alla ta stund vit vóru við teimum, goymandi at seyðinum.

17 Nú tessvegna, vita og umhugsa, hvat tú vilt gera; tí at ilt er avrátt ímóti meistara várum, og ímóti øllum húshaldi hans: tí at hann *er* ein *slíkur* Bē´-lĭ-ăl-s sonur, at *ein maður* kann ikki tala til hansara.

18 ¶ Tá gjørdi Ā´-bĭ-gâĭl skjótt, og tók tvey hundrað heilbreyð, og tveir kíkar av víni, og fimm klárt tilreiddar seyðir, og fimm mál av svidnum *korni,* og eitt hundrað tyssir av rosinum, og tvey hundrað køkur av fikum, og legði *tað upp*á asnar.

19 Og hon segði við tænarar sínar, Farið áfram undan mær; sí, eg komi aftaná tykkum. Men hon segði ikki ektamanni sínum, Ná´-băl-i, frá.

20 Og tað varð *so, sum* hon reið á asnanum, at hon kom oman við huld heyggjarins, og sí, Dávid og menn hansara komu oman ímóti henni; og hon møtti teimum.

21 Nú, Dávid hevði sagt, Vissuliga, í fáfongd havi eg goymt at øllum sum hesin *felagin* hevur í oyðuni, so at einkið varð saknað av øllum sum *tilhoyrdi* honum: og hann hevur viðurgoldið mær ilt fyri gott.

22 Soleiðis, og meira við, geri Guð innat fíggindum Dávids, um eg eftirlati av øllum, sum *hoyra* til hansara, um morgun ljósið nakran sum mígur ímóti vegginum.

23 Og tá ið Ā´-bĭ-gâĭl sá Dávid, skundaði hon *sær,* og lætti *sær* av asnanum, og fell frammi fyri Dávidi á andlit sítt, og boygdi seg til jarðarinnar,

24 Og fell við føtur hansara, og segði, Uppiá mær, harri mín, *uppiá* mær *lat hesa* misgerð *vera:* og lat tænastumoy tína, eg biði teg, tala í áhoyrn tíni, og hoyr orðini hjá tænastumoy tíni.

25 Lat ikki harra mín, eg biði teg, geva far um henda Bē´-lĭ-ăl-s mann, *enntá* Ná´-băl: tí at eins og navn hansara *er,* soleiðis *er* hann; Ná´-băl *er* navn hansara, og dárskapur *er* hjá honum: men eg, tænastumoy tín, sá ikki teir ungu menninar hjá harra mínum, sum tú sendirt.

26 Nú tessvegna, harri mín, *sum* HARRIN livir, og *sum* sál tín livir, eftirsum *at* HARRIN hevur afturhildið teg frá at koma at *úthella* blóð, og frá at hevna teg við egnu hond tíni, nú lat fíggindar tínar, og teir sum søkja ilt móti harra mínum, vera sum Ná´-băl.

27 Og nú henda signing, sum tænastumoyggj tín hevur ført at harra mínum, lat hana enntá verða givna teimum ungu monnunum sum fylgja harra mínum.

28 Eg biði teg, fyrigev misbrot tænastumoyar tínar: tí at HARRIN vil vissuliga gera harra mínum eitt trygt hús; av tí at harri mín berjist orrustur HARRANS, og ilt hevur ikki verðið funnið í tær *allar* dagar tínar.

29 Tó er ein maður risin at elta teg, og at søkja sál tína: men sál harra míns skal vera bundin í lívsbundið hjá HARRANUM Guði tínum, og sálirnar hjá fíggindum tínum, tær skal hann sleingja út, *sum út* úr miðjuni á eini sleingju.

30 Og tað skal bera á, tá ið HARRIN skal hava gjørt við harra

mín samsvarandi við alt tað góða sum hann hevur talað viðvíkjandi tær, og skal hava fyriskipað teg *til* stjórnara yvir Ísrael;

31 At hetta skal eingin harmur vera at tær, ella hjarta-meinbogi at harra mínum, ella at tú hevurt úthelt blóð grundleyst, ella at harri mín hevur hevnt seg: men tá ið HARRIN skal hava farið væl við harra mínum, tá minst til tænastumoy tína.

32 ¶ Og Dávid segði til Ā′-bĭ-gāĭl-ar, Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Ísraels, sum sendi teg henda dag at møta mær:

33 Og vælsignað *veri* tilráðing tín, og vælsignað *veri* tú sum hevurt hildið mær henda dag frá at koma at *úthella* blóð, og frá at hevna meg sjálvan við egnu hond míni.

34 Tí at í sjálvastu roynd og veru, *sum* HARRIN Guð Ísraels livir, sum hevur hildið mær aftur frá at skaða teg, uttan tú hevðirt skundað *tær* og komið at møta mær, vissuliga hevði tað ikki verið eftirlatin Ná′-băl-i um morgun ljósið nakar sum migur ímóti vegginum.

35 So Dávid tók ímóti av hennara hond *tað* sum hon hevði ført honum, og segði við hana, Far upp í friði til húss tíns; sí, eg havi givið gætur eftir rødd tíni, og havi góðtikið tín persón.

36 ¶ Og Ā′-bĭ-gāĭl kom til Ná′-băl-s; og sí, hann helt eina veitslu í húsi sínum, eins og veitslan hjá einum kongi; og Ná′-băl-s hjarta *var* kátt innan í honum, tí at hann *var* sera drukkin: hvørsvegna hon segði honum einkið, minni ella meira, inntil morgun ljósið.

37 Men tað bar á um morgunin, tá ið vínið var farið út úr Ná′-băl-i, og kona hansara hevði sagt honum hesar lutir, at hansara hjarta doyði innan í honum, og hann gjørdist *sum* ein steinur.

38 Og tað bar á umleið tíggju dagar *aftaná,* at HARRIN sló Ná′-băl, *so* at hann doyði.

39 ¶ Og tá ið Dávid hoyrdi, at Ná′-băl var deyður, segði hann, Vælsignaður *veri* HARRIN, sum hevur vart søk skemdar mínar frá hendi Ná′-băl-s, og hevur hildið tænara sínum frá illum: tí at HARRIN hevur vent aftur vondsku Ná′-băl-s uppá egna høvur hans. Og Dávid sendi og samtalaði við Ā′-bĭ-gāĭl, at taka hana til sín til konu.

40 Og tá ið tænarar Dávids vóru komnir til Ā′-bĭ-gāĭl-ar til Carmels, talaðu teir við hana, sigandi, Dávid sendi okkum at tær, at taka teg til sín til konu.

41 Og hon reistist, og boygdi seg á andlit *sítt* til jarðarinnar, og segði, Sí, *lat* tænastumoy tína *vera* ein tænari til at tváa føturnar hjá tænarum harra míns.

42 Og Ā′-bĭ-gāĭl skundaði *sær,* og reistist, og reið uppiá einum asna, við fimm av gentum sínum, sum fóru aftaná henni; og hon fór aftaná sendiboðum Dávids, og gjørdist ektakona hansara.

43 Dávid eisini tók Ă-hĭn′-ō-ăm úr Jĕz′-rēēl; og tær vóru eisini, báðar av teimum, konur hansara.

44 ¶ Men Saul hevði givið Michal, dóttur sína, konu Dávids, til Phăl′-tī-s Lá′-ĭsj sonar, sum *var* úr Găl′-lĭm.

KAPITUL 26

OG Ziphitarnir komu at Sauli til Gĭ-bē′-ūh, sigandi, Fjalir ikki Dávid seg í Há′-chĭ-lăh hóli, *sum er* frammanfyri Jē′-sjĭ-mŏn?

2 Tá reistist Saul, og fór oman til Ziphs oyðu, havandi trý túsund útvaldar menn av Ísrael við sær, at søkja Dávid í Ziphs oyðu.

3 Og Saul sló upp á Há′-chĭ-lăh hóli, sum *er* frammanfyri Jē′-sjĭ-mŏn, við vegin. Men Dávid varð

í oyðuni, og hann sá, at Saul kom eftir sær inn í oyðuna.

4 Dávid tí sendi út njósnarar, og skilti, at Saul var komin í sjálvari roynd *og veru.*

5 ¶ Og Dávid reistist, og kom til plássið har Saul hevði sligið upp: og Dávid skoðaði plássið har Saul lá, og Abner Nérs sonur, høvuðsmaðurin av herliði hansara: og Saul lá í skotgrøvini, og fólkið sló upp rundan um hann.

6 Tá tók Dávid til orða og segði til Ă-hĭm´-ĕ-lĕch-s Hittita, og til Á´-bĭ-sjâi-s Zĕr-ū´-jŭh sonar, bróðir til Jó´-ăb-s, sigandi, Hvør vil fara oman við mær til Sauls til leirin? Og Á´-bĭ-sjâi segði, Eg vil fara oman við tær.

7 So Dávid og Á´-bĭ-sjâi komu til fólkið um nátt*ina:* og sí, Saul lá sovandi innanfyri skotgrøvina, og hansara spjót stungið í lendið við høvdalag hansara: men Abner og fólkið lógu rundan um hann.

8 Tá segði Á´-bĭ-sjâi til Dávids, Guð hevur flýggjað tín fíggindа inn í hond tína henda dag: nú tessvegna, lat meg sláa hann, eg biði teg, við spjótinum enntá til jarðarinnar alt fyri eitt, og eg vil ikki *sláa* hann aðru ferðina.

9 Og Dávid segði til Á´-bĭ-sjâi-s, Oyð hann ikki: tí at hvør kann rætta fram hond sína ímóti HARRANS salvaða, og vera sakleysur?

10 Dávid segði harafturat, *Sum* HARRIN livir, HARRIN skal sláa hann; ella hansara dagur skal koma at doyggja; ella hann skal stíga niður í bardaga, og farast.

11 HARRIN sýti fyri, at eg skuldi rætt fram mína hond ímóti HARRANS salvaða: men, eg biði teg, tak tú nú spjótið, sum *er* við høvdalag hansara, og keraldið av vatni, og latum okkum fara.

12 So Dávid tók spjótið og keraldið av vatni frá høvdalagi Sauls; og teir sluppu sær avstað, og eingin maður sá *tað,* ella vitsti *tað,* eiheldur vaknaði: tí at teir svóvu allir; av tí at ein djúpur svøvnur frá HARRANUM var fallin uppá teir.

13 ¶ Tá fór Dávid yvirum hīnumegin, og stóð á toppinum av einum hóli langt burturifrá; eitt mikið bil *verandi* ímillum teir:

14 Og Dávid geylaði til fólksins, og til Abners Nérs sonar, sigandi, Svarart tú ikki, Abner? Tá svaraði Abner og segði, Hvør *ert* tú, *sum* geylart til kongsins?

15 Og Dávid segði til Abners, *Ert* ikki tú ein *reystur* maður? og hvør *er* líkur fyri tær í Ísrael? hvørsvegna hevurt tú tá ikki varðað harra tín, kongin? tí at tað kom ēin av fólkinum inn at oyða kongin, harra tín.

16 Hetta tingið *er* ikki gott, sum tú hevurt gjørt. *Sum* HARRIN livir, tit *eru* verdigir at doyggja, av tí at tit hava ikki varðað meistara tykkara, HARRANS salvaða. Og nú, gáa *eftir* hvar kongsins spjót *er,* og keraldið av vatni, sum *var* við høvdalag hans.

17 Og Saul kendi røddina hjá Dávidi, og segði, *Er* hetta rødd tín, sonur mín Dávid? Og Dávid segði, *Tað er* rødd mín, harri mín, O kongur.

18 Og hann segði, Hvørsvegna eltir harri mín soleiðis eftir tænara sínum? tí at hvat havi eg gjørt? ella hvat ilt *er* í hond míni?

19 Nú tessvegna, eg biði teg, lat harra mín, kong, hoyra orð tænara síns. Um HARRIN havi rørt teg upp ímóti mær, lat hann taka ímóti einum ofri: men um *teir veri* børn manna, bannaðir *veri* teir frammi fyri HARRANUM; tí at teir hava rikið meg út henda dag frá at dvølja í arvi HARRANS, sigandi, Far, tæn øðrum gudum.

20 Nú tessvegna, lat ikki mítt blóð falla til jarðarinnar frammi

fyri andliti HARRANS: tí at kongur Ísraels er komin út at søkja eina loppu, sum tá ið ein veiðir eina akurhønu í fjøllunum.

21 ¶ Tá segði Saul, Eg havi syndað: kom aftur, sonur mín Dávid: tí at eg vil ei meira gera tær mein, av tí at sál mín var dýrabær í eygum tínum henda dag: sí, eg havi spælt dárin, og eri farin skeivur ovurhondsliga.

22 Og Dávid svaraði og segði, Sí spjótið hjá kongi! og lat ein av teimum ungu monnunum koma yvir og heinta tað.

23 HARRIN rindi til hvørs mans hansara rættvísi og hansara trúskap: tí at HARRIN flýggjaði teg inn í hond *mína* í dag, men eg vildi ikki rætta fram mína hond ímóti HARRANS salvaða.

24 Og sí, eins og títt lív var mikið hildið um henda dag í eygum mínum, soleiðis lat mítt lív vera mikið hildið um í eygum HARRANS, og lat hann útfría meg burtur úr allari trongslu.

25 Tá segði Saul til Dávids, Vælsignaður *veri* tú, sonur mín Dávid: tú skalt bæði gera miklar *lutir,* og eisini skalt enn hava yvirvág. So Dávid fór sín veg, og Saul vendi aftur til plass sítt.

KAPITUL 27

OG Dávid segði í hjarta sínum, Eg skal nú farast ein dag við hendi Sauls: *tað er* einkið betri hjá mær, enn at eg skuldi fljótliga komist undan inn í land Philistanna; og Saul skal *vera* vónleysur um meg, at søkja eftir mær longur í nøkrum bredda Ísraels: soleiðis skal eg komast undan út úr hond hansara.

2 Og Dávid reistist, og hann fór yvir við teimum seks hundrað monnunum, sum *vóru* við honum, at Á-chīsj Má-ōch-s syni, kongi av Gáth.

3 Og Dávid dvaldist hjá Á-chīsj í Gáth, hann og menn hansara, hvør maður við húski sínum, *enntá* Dávid við konum sínum tveim, Ă-hĭn-ō-ăm-i — Jĕz-rēĕl-ĭt-ĭnn-uni, og Ā-bī-gâĭl-i — Carmelitinnuni, konu Nā-băl-s.

4 Og tað varð sagt Sauli, at Dávid var flýddur til Gáth: og hann leitaði ei meira aftur eftir honum.

5 ¶ Og Dávid segði við Á-chīsj, Um eg havi nú funnið náði í eygum tínum, lat teir geva mær eitt pláss í onkrum býi í landinum: at eg má dvøljast har, tí at hví skuldi tænari tín dvalst í tí kongliga staðinum hjá tær?

6 Tá gav Á-chīsj honum Ziklag tann dagin: hvørsvegna Ziklag tilhoyrir kongunum av Judah at hesum degi.

7 Og tíðin, sum Dávid dvaldist í landi Philistanna, var eitt fult ár og fýra mánaðir.

8 ¶ Og Dávid og menn hansara fóru upp, og lupu á Gĕ-sjû-rĭt-arnar, og Gĕz-rĭt-arnar, og Ă-măl-ĕk-ĭt-arnar: tí at tær *tjóðirnar vóru* frá gomlum *av* íbúgvar landsins, sum tú fert til Sjūr, enntá at Egyptalandi.

9 Og Dávid sló landið, og eftirlæt hvørki mann ella kvinnu á lívi, og tók burtur seyðin, og oksarnar, og asnarnar, og kamelarnar, og skartaklædnaðin, og vendi aftur, og kom til Á-chīsj.

10 Og Á-chīsj segði, Hvagar hava tit gjørt veg í dag? Og Dávid segði, Ímóti suður*parti* Judah, og ímóti suður*parti* Jê-ráh-mḗĕl-ĭt-anna, og ímóti suður*parti* Kē-nĭt-anna.

11 Og Dávid bjargaði hvørki manni ella kvinnu á lívi, at bera *tíðindir* til Gáth, sigandi, At ikki tey skuldu smettað um okkum, sigandi, Soleiðis gjørdi Dávid, og soleiðis *vil* háttarlag hansara *vera* alla ta stund hann dvølist í landi Philistanna.

12 Og Á-chīsj trúði Dávidi, sigandi, Hann hevur fingið fólk sítt Ísrael fullkomiligani at standast við seg; tí skal hann vera tænari mín um ævir.

KAPITUL 28

OG tað bar á í teimum døgum, at Philistarnir savnaðu herar sínar saman til krígsførslu, at berjast við Ísrael. Og Á-chīsj segði við Dávid, Viti tú vissuliga, at tú skalt fara út við mær til orrustu, tú og menn tínir.

2 Og Dávid segði til Á-chīsj, Vissuliga skalt tú vita, hvat tænari tín kann gera. Og Á-chīsj segði til Dávids, Tí vil eg gera teg *til* passara høvurs míns um ævir.

3 ¶ Nú, Sámuel var deyður, og alt Ísrael hevði harmað hann, og jarðað hann í Rá-măh, enntá í egna staði hans. Og Saul hevði koyrt burtur hasar sum høvdu vælkunnugar andar, og gandakallarnar, út úr landinum.

4 Og Philistarnir savnaðu seg saman, og komu og slógu upp í Sjū-nĕm: og Saul savnaði allan Ísrael saman, og teir slógu upp í Gĭl-bō-ă.

5 Og tá ið Saul sá herliðið hjá Philistunum, varð hann ræddur, og hjarta hansara stórliga skalv.

6 Og tá ið Saul spurdi *seg* fyri av HARRANUM, svaraði HARRIN honum ikki, hvørki við dreymum, ella við Ū-rīm, ella við prophetum.

7 ¶ Tá segði Saul við tænarar sínar, Søkið mær eina kvinnu, sum hevur ein vælkunnugan anda, at eg má fara til hennara, og fregnast av henni. Og hansara tænarar søgdu til hansara, Sí, *tað er* ein kvinna sum hevur ein vælkunnugan anda í En-dor.

8 Og Saul dulbúði seg, og fór í annan klædnað, og hann fór, og tveir menn við honum, og teir komu til kvinnuna um nátt*ina:* og hann segði, Eg biði teg, spásig mær við tann vælkunnuga andan, og før mær *hann* upp, hvønn eg skal nevna tær.

9 Og kvinnan segði við hann, Sí, tú veitst hvat Saul hevur gjørt, hvussu hann hevur skorið av hasar sum hava vælkunnugar andar, og gandakallarnar, út úr landinum: hvørsvegna tá leggurt tú eina snerru fyri lívi mínum, at elva mær at doyggja?

10 Og Saul svór fyri henni við HARRAN, sigandi, *Sum* HARRIN livir, tað skal eingin revsing henda mót tær fyri henda lut.

11 Tá segði kvinnan, Hvønn skal eg føra upp at tær? Og hann segði, Før mær upp Sámuel.

12 Og tá ið kvinnan sá Sámuel, geyladi hon við harðari reyst: og kvinnan talaði til Sauls, sigandi, Hví hevurt tú svikið meg? tí at tú *ert* Saul.

13 Og kongur segði við hana, Ver ikki rædd: tí at hvat sást tú? Og kvinnan segði við Saul, Eg sá gudar stígandi upp út úr jørðini.

14 Og hann segði við hana, Hvørjum skapi *er* hann av? Og hon segði, Ein gamalur maður kemur upp; og hann *er* huldur við einum kappa. Og Saul varnaðist, at tað *var* Sámuel, og hann heyk við andliti *sínum* til jarðarinnar, og boygdi seg.

15 ¶ Og Sámuel segði til Sauls, Hví hevurt tú órógvað meg, at føra meg upp? Og Saul svaraði, Eg eri sára neyðstaddur; tí at Philistarnir føra kríggj ímóti mær, og Guð er vikin frá mær, og svarar mær ikki meira, hvørki við prophetum, ella við dreymum: tí havi eg kallað teg, at tú mást gera mær kunnugt hvat eg skal gera.

16 Tá segði Sámuel, Hvørsvegna spyrt tú tá av mær, eftirsum *at* HARRIN er vikin frá tær, og er vorðin tín figgindi?

17 Og HARRIN hevur gjørt við hann, eins og hann talaði við

mær: tí at HARRIN hevur skrætt kongadømið út úr hond tíni, og givið tað til næsta tín, *enntá* til Dávids:

18 Av tí at tú lýddirt ikki rødd HARRANS, ella útinntirt hansara grimmu vreiði omanyvir Á'-mâlĕk, tí hevur HARRIN gjørt henda lut at tær henda dag.

19 Harafturat vil HARRIN eisini flýggja Ísrael við tær inn í hondina á Philistunum: og í morgin *skalt* tú og tínir synir *vera* hjá mær: HARRIN eisini skal flýggja Ísraels herlið inn í hondina á Philistunum.

20 Tá fell Saul beinanvegin alla *leið* yvireftir á jørðina, og var sára ræddur, uppá grund av orðum Sámuels: og tað var eingin styrki í honum; tí at hann hevði einkið breyð etið allan dagin, ella alla náttina.

21 ¶ Og kvinnan kom at Sauli, og sá, at hann var sára trongdur, og segði við hann, Sí, tín tænastumoyggj hevur lýtt rødd tína, og eg havi sett lív mítt í hond mína, og havi lýtt á orð tíni, sum tú talaðirt við meg.

22 Nú tessvegna, eg biði teg, lýð tú eisini á røddina hjá tænastumoy tíni, og lat meg seta ein bita av breyði frammanfyri tær; og et, at tú mást hava styrki, tá ið tú fert á vegi tínum.

23 Men hann sýtti, og segði, Eg vil ikki eta. Men hansara tænarar, saman við kvinnuni, noyddu hann; og hann gav gætur at rødd teirra. So hann reistist frá jørðini, og settist uppá songina.

24 Og kvinnan hevði ein feitan kálv í húsinum; og hon skundaði *sær,* og drap hann, og tók mjøl, og knoðaði *tað,* og bakaði ósúrgað breyð harúr:

25 Og hon førdi *tað* framfyri Saul, og framfyri tænarar hansara; og teir ótu. So risu teir upp, og fóru avstað ta náttina.

KAPITUL 29

NÚ, Philistarnir savnaðu saman allar herar sínar til Á'-phĕk: og Ísraelitarnir slógu upp við eina keldu sum *er* í Jĕz'-rēĕl.

2 Og fúrstarnir hjá Philistunum fóru áfram eftir hundraðum, og eftir túsundum: men Dávid og menn hansara fóru áfram í bakendanum við Á'-chĭsj.

3 Tá søgdu prinsarnir hjá Philistunum, Hvat *gera* hesir Hebrēararnir *her?* Og Á'-chĭsj segði við prinsarnar hjá Philistunum, *Er* ikki hesin Dávid, tænari Sauls kongs av Ísrael, sum hevur verið við mær hesar dagarnar, ella hesi árini, og eg havi ongan feil funnið í honum, síðan hann fell *at mær,* at hesum degi?

4 Og prinsarnir hjá Philistunum vóru vreiðir við hann; og prinsarnir hjá Philistunum søgdu við hann, Fá henda felagan *at* venda aftur, at hann má fara aftur til pláss sítt, sum tú hevurt útnevnt honum, og lat hann ikki fara oman við okkum til orrustu, at ikki í bardaganum hann verði ein mótstandari mót okkum: tí at hvarvið skuldi hann endursónað seg at meistara sínum? *skuldi tað* ikki *verið* við høvdunum á hesum monnunum?

5 *Er* ikki hesin Dávid, um hvønn tær sungu hvør fyri aðrari í dansum, sigandi, Saul vá sínar túsundir, og Dávid sínar tíggju túsundir?

6 ¶ Tá kallaði Á'-chĭsj Dávid, og segði við hann, Vissuliga, *sum* HARRIN livir, tú hevurt verið reiðiligur, og tín faring út og tín koming inn hjá mær í herliðinum *er* góð í eygsjón míni: tí at eg havi ikki funnið ilt í tær, síðan dagin av komu tíni at mær, at hesum degi: hóast hetta, fúrstunum toknar teg ikki.

7 Hvørsvegna nú, vend aftur,

og far í friði, at tú misnøgdi ikki fúrstarnar hjá Philistunum.

8 ¶ Og Dávid segði við Á-chīsj, Men hvat havi eg gjørt? og hvat hevurt tú funnið í tænara tínum, so leingi sum eg havi verið hjá tær at hesum degi, at eg má ikki fara *at* berjast ímóti figgindum harra míns, kongsins?

9 Og Á-chīsj svaraði og segði til Dávids, Eg veit, at tú *ert* góður í eygsjón míni, sum ein eingil Guðs: hóast hetta, prinsarnir hjá Philistunum hava sagt, Hann skal ikki fara upp við okkum til bardagan.

10 Hvørsvegna nú, rís upp árla um morgunin við tænarum meistara tíns, sum eru komnir við tær: og so skjótt sum tit verði uppi árla um morgunin, og hava ljós, farið avstað.

11 So Dávid og menn hansara risu upp árla til at fara avstað um morgunin, til at venda aftur inn í land Philistanna. Og Philistarnir fóru niðan til Jēz-rēēl.

KAPITUL 30

OG tað bar á, tá ið Dávid og hansara menn vóru komnir til Ziklag á tí triðja deginum, at Â-măl-ĕk-īt-arnir høvdu lopið á suður*lut*an, og Ziklag, og sligið Ziklag, og brent hann við eldi;

2 Og høvdu tikið kvinnurnar *til* fangar, sum *vóru* harí: teir vógu ikki nakran, hvørki stóran ella lítlan, men bóru *tey* burtur, og fóru sín veg.

3 ¶ So Dávid og menn hansara komu til staðin, og sí, *hann var* brendur við eldi; og konur teirra, og synir teirra, og døtur teirra, vóru tikin *til* fangar.

4 Dávid, og fólkið sum við honum *vóru,* tá lyftu upp sína rødd og grótu, inntil teir høvdu ongan meira mátt til at gráta.

5 Og Dávids tvær konur vóru tiknar *til* fangar, Ă-hĭn-ō-ăm, Jĕzrēēl-īt-ĭnn-an; og Ă-bĭ-gāil, kona Ná-băl-s Carmelita.

6 Og Dávid var stórliga neyðstaddur; tí at fólkið talaði um at steina hann, av tí at sálin hjá øllum fólkinum var hørm, hvør maður fyri synir sínar og fyri døtur sínar: men Dávid tilstuðlaði sær sjálvum í HARRANUM Guði sínum.

7 Og Dávid segði til Ă-bĭ-ă-thâr-s prests, sonar Â-hĭm-ē-lēch-s, Eg biði teg, før mær higar ê-phōd-una. Og Ă-bĭ-ă-thâr førdi hagar ê-phōd-una til Dávids.

8 Og Dávid spurdi *seg* fyri hjá HARRANUM, sigandi, Skal eg elta eftir hesi fylkingini? skal eg innheinta teir? Og hann svaraði honum, Elt: tí at tú skalt vissuliga innheinta *teir,* og uttan svit endurvinna *alt.*

9 So Dávid fór, hann og teir seks hundrað menninir sum við honum *vóru,* og komu til áarløkin Bē-sôr, har teir, sum vórðu eftirlatnir, steðgaðu.

10 Men Dávid elti, hann og fýra hundrað menn: tí at tvey hundrað vórðu eftir, sum vóru so lúgvaðir, at teir kundu ikki fara yvirum áarløkin Bē-sôr.

11 ¶ Og teir funnu ein Egypta í akrinum, og førdu hann til Dávids, og góvu honum breyð, og hann át; og teir fingu hann *at* drekka vatn;

12 Og teir góvu honum eitt stykki av eini fikukøku, og tvey tyssir av rosinum: og tá ið hann hevði etið, kom andi hans aftur til hansara: tí at hann hevði einkið breyð etið, ella drukkið *nakað* vatn, tríggjar dagar og tríggjar nætur.

13 Og Dávid segði við hann, Til hvørs *hoyrirt* tú? og hvaðan *ert* tú? og hann segði, Eg *eri* ein ungur maður úr Egyptalandi, tænari fyri einum Â-măl-ĕk-īt-a; og meistari mín eftirlæt meg, av tí at *fyri* trimum døgum lidnum fell eg sjúkur.

14 Vit gjørdu eitt álop *á* suður-

luta Chĕr-ĕ-thĭt´-anna, og á *breddan* sum *hoyrir* til Judah, og uppá suður*luta* Calebs; og vit brendu Ziklag við eldi.

15 Og Dávid segði til hansara, Kanst tú føra meg oman til henda flokk? Og hann segði, Svør mær við Guð, at tú vilt hvørki drepa meg, ella flýggja meg inn í hendur meistara míns, og eg vil føra teg oman til henda flokk.

16 ¶ Og tá ið hann hevði ført hann oman, sí, *teir vóru* breiddir útum uppiá allari jørðini, etandi og drekkandi, og dansandi uppá grund av øllum tí mikla ránsfæi, sum teir høvdu tikið úr landi Philistanna, og úr landi Judah.

17 Og Dávid sló teir frá hálvalýsinum alt at kvøldi hins næsta dags: og tað komst undan ikki ein maður av teimum, uttan fýra hundrað ungir menn, sum riðu uppiá kamelum, og flýddu.

18 Og Dávid endurvann alt, sum Â-măl-ĕk-ĭt´-arnir høvdu borið burtur: og Dávid bjargaði konum sínum tveim.

19 Og har var einkið vantandi hjá teimum, hvørki lítið ella stórt, hvørki synir ella døtur, hvørki ránsfæ, ella nakað *ting* sum teir høvdu tikið til sín: Dávid endurvann alt.

20 Og Dávid tók øll smáfæafylgini og stórfæafylgini, *sum* teir róku frammanfyri *hīnum* fenaðinum, og søgdu, Hetta *er* ránsfæið hjá Dávidi.

21 ¶ Og Dávid kom til teir tvey hundrað menninar, sum vóru so lúgvaðir, at teir fingu ikki fylgt Dávidi, hvørjar teir høvdu fingið eisini til at verða við áarløkin Bĕ´-sôr: og teir fóru fram at møta Dávidi, og at møta fólkinum sum *vóru* við honum: og tá ið Dávid kom nær til fólkið, heilsaði hann teimum.

22 Tá svaraðu allir teir vondu menninir og Bĕ´-lĭ-ăl-s *menn,* av teimum sum fóru við Dávidi, og søgdu, Av tí at teir fóru ikki við okkum, vilja vit ikki geva teimum *nakað* av fonginum, sum vit hava endurvunnið, uttan til hvønn mann konu hansara og børn hansara, at teir mega leiða *tey* burtur, og fara avstað.

23 Tá segði Dávid, Tit skulu ikki gera soleiðis, brøður mínir, við tað sum HARRIN hevur givið okkum, sum hevur varðveitt okkum, og flýggjað flokkin, sum kom ímóti okkum, inn í hond okkara.

24 Tí at hvør vil lýða á tykkum í hesum máli? men eins og hansara partur *er,* sum fer oman til bardagan, soleiðis *skal* hansara partur *vera,* sum verður hjá tingunum: teir skulu skifta líka.

25 Og tað varð *soleiðis* frá tí degi frameftir, at hann gjørdi tað *til* eina áseting og eina regluskipan hjá Ísrael at hesum degi.

26 ¶ Og tá ið Dávid kom til Ziklag, sendi hann av fonginum at hinum elstu av Judah, *enntá* til vina sína, sigandi, Sí ein gáva til tykkara av fonginum av figgindum HARRANS;

27 Til *teirra* sum *vóru* í Beth-el, og til *teirra* sum *vóru* í suður Rá-mŏth, og til *teirra* sum *vóru* í Jăt´-tîr,

28 Og til *teirra* sum *vóru* í Á´-rŏ-ĕr, og til *teirra* sum *vóru* í Sĭph´-mŏth, og til *teirra* sum *vóru* í Ēsj´-tĕ-mŏ´-ă,

29 Og til *teirra* sum *vóru* í Rā´-chăl, og til *teirra* sum *vóru* í staðunum hjá Jĕ-ráh-mē´el-ĭt´-unum, og til *teirra* sum *vóru* í staðunum hjá Kē-nĭt´-unum,

30 Og til *teirra* sum *vóru* í Hŏr´-măh, og til *teirra* sum *vóru* í Chôr-ăsj´-ăn, og til *teirra* sum *vóru* í Ā´-thăch,

31 Og til *teirra* sum *vóru* í Hē´-brŏn, og til øll tey plássini, har Dávid sjálvur og menn hansara vóru vanir at hølast.

KAPITUL 31

NÚ, Philistarnir bardust ímóti Ísrael: og menninir av Ísrael flýddu frammanfyri Philistunum ífrá, og fullu niður vignir á Gīl-bŏ´-ă fjalli.

2 Og Philistarnir fylgdu tætt uppat Sauli og uppat sonum hansara; og Philistarnir vógu Jónathan, og Ă-bĭn´-ă-dăb, og Măl´-chĭ-sjŭ´-ă, synir Sauls.

3 Og bardagin gekk sárt ímóti Sauli, og bogaskjúttarnir raktu hann; og hann varð sára særdur av bogaskjúttunum.

4 Tá segði Saul við brynjubera sín, Drag svørð títt, og stoyt meg ígjøgnum harvið; at ikki hesir óumskornu komi og stoyti meg ígjøgn, og misbrúki meg. Men hansara brynjuberi vildi ikki; tí at hann var sára ræddur. Saul tessvegna tók eitt svørð, og fell uppá tað.

5 Og tá ið brynjuberi hansara sá, at Saul var deyður, fell hann somuleiðis uppá svørð sítt, og doyði við honum.

6 So Saul doyði, og synir hansara tríggir, og brynjuberi hansara, og allir menn hansara, hin sama dag tilsaman.

7 ¶ Og tá ið menninir av Ísrael sum *vóru* hīnumegin dalin, og *teir* sum *vóru* hīnumegin Jordan, sóu, at menninir av Ísrael flýddu, og at Saul og synir hansara vóru deyðir, yvirgóvu teir staðirnar, og flýddu; og Philistarnir komu og dvaldust í teimum.

8 Og tað bar á um morgisárið, tá ið Philistarnir komu at skræða *av* teimum vignu, at teir funnu Saul og synir hansara tríggjar falnar á Gīl-bŏ´-ă fjalli.

9 Og teir høgdu av høvur hansara, og skræddu av herbúnað hansara, og sendu inn í land Philistanna runt umkring, at kunngera *tað í* húsi avguda sína, og millum fólksins.

10 Og teir settu herbúnað hansara í hús Ásj´-tă-rōth-s: og teir festu likam hansara til múr Bĕth´-sjăn-s.

11 ¶ Og tá ið íbúgvarnir av Já´-bĕsj-gī´-lĕ-ăd hoyrdu um tað sum Philistarnir høvdu gjørt við Saul;

12 Reistust allir teir reystu menninir, og fóru alla nátt, og tóku likamið av Sauli og likamini av sonum hansara frá múri Bĕth´-sjăn-s, og komu til Já´-bĕsj, og brendu tey har.

13 Og teir tóku beinˇ teirra, og jarðaðu *tey* undir einum træi í Já´-bĕsj, og fastaðu sjey dagar.

HIN SEINNA

BÓK SÁMUELS,

ANNARS KALLAÐ,

HIN ONNUR BÓK KONGANNA.

KAPITUL 1

NÚ, tað bar á aftaná deyða Sauls, tá ið Dávid var komin aftur frá slátringini av Ă-măl-ĕk-ĭt´-unum, og Dávid hevði verðið tveir dagar í Ziklag;

2 Tað bar enntá á á tí triðja deginum, at sí, ein maður kom út úr leirinum frá Sauli við klæðum sínum skrøddum, og mold uppi á høvdi sínum: og *soleiðis* varð tað, tá ið hann kom til Dávids, at hann fell til jarðarinnar, og inti heiðurslútan.

3 Og Dávid segði við hann,

Hvaðani frá kemurt tú? Og hann segði við hann, Út úr leiri Israels eri eg rýmdur.

4 Og Dávid segði við hann, Hvussu fór málið? Eg biði teg, sig mær. Og hann svaraði, At fólkið eru flýddir frá bardaganum, og mangir av fólkinum eisini eru falnir og deyðir; og Saul og Jónathan, sonur hansara, eru deyðir eisini.

5 Og Dávid segði við tann unga mannin sum segði honum frá, Hvussu veitst tú, at Saul og Jónathan, sonur hansara, veri deyðir?

6 Og hin ungi maðurin, sum segði honum frá, segði, Sum eg bar á av tilvild uppiá Gil-bō´-ă fjalli, sí, Saul lenaðist uppá spjót sítt; og sí, vagnarnir og hestmenninir fylgdu tætt eftir honum.

7 Og tá ið hann hugdi afturum seg, sá hann meg, og kallaði á meg. Og eg svaraði, Her *eri* eg.

8 Og hann segði við meg, Hvør *ert* tú? Og eg svaraði honum, Eg *eri* ein Â-măl-ĕk-ĭt´-i.

9 Hann segði við meg aftur, Statt, eg biði teg, uppiá mær, og veg meg: tí at angist er komin uppá meg, av tí at mítt lív *er* enn heilt í mær.

10 So eg stóð uppiá honum, og vó hann, av tí at eg var vísur *í*, at hann kundi ikki livað, eftir at hann var fallin: og eg tók krúnuna sum *var* uppiá høvdi hansara, og armbandið sum *var* á armi hansara, og havi ført tey higar at harra mínum.

11 Tá tók Dávid hald á klæðum sínum, og skræddi tey; og líkaleiðis allir menninir sum *vóru* við honum:

12 Og teir harmaðu, og grótu, og fastaðu inntil aftan, fyri Saul, og fyri Jónathan — son hansara, og fyri fólk HARRANS, og fyri hús Ísraels; av tí at teir vóru falnir við^ svørðinum.

13 ¶ Og Dávid segði við hin unga mannin sum segði honum frá, Hvaðan *ert* tú? Og hann svaraði, Eg *eri* sonur ein fremmandan, ein Â-măl-ĕk-ĭt´-a.

14 Og Dávid segði við hann, Hvussu vart tú ikki ræddur *fyri* at rætta fram hond tína til at oyða HARRANS salvaða?

15 Og Dávid kallaði ēin av teimum ungu monnunum, og segði, Far nær, *og* fall uppá hann. Og hann sló hann, at hann doyði.

16 Og Dávid segði við hann, Títt blóð *veri* uppiá høvdi tínum; tí at tín muður hevur vitnað ímóti tær, sigandi, Eg havi vigið HARRANS salvaða.

17 ¶ Og Dávid harmaði við hesum harmljóði yvir Saul og yvir Jónathan, son hansara:

18 (Hann eisini beyð teimum frálæra børnum Judah *brúkið av* boganum: sí, *tað er* skrivað í Jăsj´-ĕr-s bók.)

19 Ísraels vakurleiki er vigin uppiá tínum høgu plássum: hvør eru hinir mektigu falnir!

20 Sig ikki frá *tí* í Gáth, kunnger *tað* ikki í gøtunum av Ăs´-kĕ-lōn; at ikki døturnar hjá Philistunum fegnist, at ikki døtur hinna óumskornu frøist *í siguri*.

21 Tit fjøll av Gil-bō´-ă, *lat* onga døgg *vera*, eiheldur *lat tað vera* regn, uppiá tykkum, ella akrar av ofrum: tí at har er skjøldur hinna mektigu ønskriliga kastaður burtur, skjøldurin hjá Sauli, *sum um hann* ei *hevði verið* salvaður við olju.

22 Frá blóði hinna vignu, frá fiti hinna mektigu, bogin hjá Jónathani vendi ikki aftur, og svørðið hjá Sauli vendi ikki aftur tómt.

23 Saul og Jónathan *vóru* yndisligir og dámligir í lívum sínum, og í sínum deyða vóru teir ikki atskildir: teir vóru skjótari enn ørnir, teir vóru sterkari enn leyvur.

24 Tit Ísraels døtur, grátið um Saul, sum klæddi tykkum í skarlak, við *øðrum* fragdum, sum setti á prýðislutir av gulli uppá tykkara stásbúna.

25 Hvør eru hinir mektigu falnir í miðjum bardaganum! O Jónathan, *tú varðst* vigin í tínum høgu plássum.

26 Eg eri neyðstaddur vegna tín, bróðir mín Jónathan: sera dámligur hevurt tú verið mær: tín kærleiki til mín var undurfullur, farandi framum kærleika kvenna.

27 Hvør eru hinir mektigu falnir, og krígsvápnini týnd!

KAPITUL 2

OG tað bar á eftir hetta, at Dávid spurdi *seg* fyri av HARRANUM, sigandi, Skal eg fara niðan í nakran av staðum Judah? Og HARRIN segði við hann, Far niðan. Og Dávid segði, Hvagar skal eg fara niðan? Og hann segði, Át Hē´-brŏn.

2 So Dávid fór niðan hagar, og konur hansara tvær eisini, Á-hĭn´-ō-ăm, Jĕz-rēe̊l-ĭt-ĭnn´-an; og Ā-bĭ-gaîl, kona Nā´-băl-s Carmelita.

3 Og sínar menn, sum *vóru* við honum, førdi Dávid niðan, hvønn mann við húski hansara: og teir dvaldust í staðum Hē´-brŏn-s.

4 Og menninir av Judah komu, og har salvaðu teir Dávid *til* kong yvir húsi Judah. Og teir taldu Dávidi, sigandi, *At* menninir av Já´-bĕsj-gī´-lē-ăd *vóru teir* sum jarðaðu Saul.

5 ¶ Og Dávid sendi sendiboðar at monnunum av Já´-bĕsj-gī´-lē-ăd, og segði við teir, Vælsignaðir *veri* tit av HARRANUM, at tit hava sýnt hesa blídni at harra tykkara, *enntá* at Sauli, og hava jarðað hann.

6 Og nú, HARRIN sýni blídni og sannleika at tykkum: og eg eisini vil viðurgjalda tykkum hesa blídni, av tí at tit hava gjørt henda lut.

7 Tessvegna nú, latið hendur tykkara verða styrktar, og verið tit reystir: tí at meistari tykkara, Saul, er deyður, og eisini Judah hús hava salvað meg *til* kong yvir sær.

8 ¶ Men Abner Nērs sonur, høvuðsmaðurin av herliði Sauls, tók Ĭsj´-bŏ-sjēth, son Sauls, og førdi hann yvir til Mă-há´-nă-ĭm;

9 Og gjørdi hann *til* kong yvir Gilead, og yvir Āsj-û-rĭt´-unum, og yvir Jĕz´-rēe̊l, og yvir Ē´-phră-ĭm, og yvir Benjamin, og yvir øllum Ísrael.

10 Ĭsj´-bŏ-sjēth Sauls sonur *var* fjøruti ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja yvir Ísrael, og ríkti tvey ár. Men Judah hús fylgdi Dávidi.

11 Og tíðin, sum Dávid var kongur í Hē´-brŏn yvir húsi Judah, var sjey ár og seks mánaðir.

12 ¶ Og Abner Nērs sonur, og tænarar Ĭsj´-bŏ-sjēth-s Sauls sonar, fóru út frá Mă-há´-nă-ĭm til Gibeon.

13 Og Jó´-ăb Zĕr-ū´-jŭh sonur, og tænarar Dávids, fóru út, og møttust saman við hyl Gibeons: og teir settust niður, tann ēini ēinumegin hylin, og hīn hīnumegin hylin.

14 Og Abner segði til Jó´-ăb-s, Lat teir ungu menninar nú reisast, og spæla frammi fyri okkum. Og Jó´-ăb segði, Lat teir reisast.

15 Tá reistust tað og fóru yvir eftir tali tólv av Benjamin, sum *hoyrdu* til Ĭsj´-bŏ-sjēth-s Sauls sonar, og tólv av tænarum Dávids.

16 Og teir fangaðu hvør *og* ēin felaga sín eftir høvdinum, og *stoyttu* svørð sítt í síðu felaga síns; so teir fullu niður saman: hvørsvegna tað plássið varð kallað Hēl´-kăth-hăz-zū´-rĭm, sum *er* í Gibeon.

17 Og har varð ein sera svárur bardagi tann dagin; og Abner varð sligin, og menninir av Ísrael, frammi fyri tænarum Dávids.

18 ¶ Og tað vóru tríggir synir hjá Zĕr-ū′-jăh har, Jó′-ăb, og Á′-bĭ-sjāī, og Ás′-ă-hĕl: og Ás′-ă-hĕl *var so* lættur til fóts sum eitt vilt rádýr.

19 Og Ás′-ă-hĕl elti eftir Abneri; og í at fara vendi hann ikki til hinnar høgru handar, ella til hinnar vinstru, frá at fylgja Abneri.

20 Tá hugdi Abner afturum seg, og segði, *Ert* tú Ás′-ă-hĕl? Og hann segði, Eg *eri*.

21 Og Abner segði til hansara, Vend tær til viks til tínar høgru handar, ella til tínar vinstru, og legg tær hald á ēin av teimum ungu monnunum, og tak tær herbúnað hans. Men Ás′-ă-hĕl vildi ikki venda til viks frá at fylgja honum.

22 Og Abner segði aftur til Ás′-ă-hĕl-s, Vend tær til viks frá at fylgja mær: hvørsvegna skuldi eg sligið teg til jarðarinnar? hvussu skuldi eg tá hildið uppi andliti mínum fyri Jó′-ăb-i, bróður tínum?

23 Hóast hetta, hann noktaði at venda til viks: hvørsvegna Abner, við aftara endanum av spjótinum, sló hann undir hitt fimta *rivjabeinið,* at spjótið kom út aftanfyri hann; og hann fell niður har, og doyði í tí sama plássinum: og tað bar á, *at* so mangir sum komu til plássið, har Ás′-ă-hĕl fell niður og doyði, stóðu stillir.

24 Jó′-ăb eisini og Á′-bĭ-sjāī eltu eftir Abneri: og sólin fór niður, tá ið teir vóru komnir til Ăm′-măh hól, sum *liggur* frammanfyri Gī′-ăh við veg Gibeons oyðu.

25 ¶ Og Benjamins børn savnaðu seg saman eftir Abneri, og gjørdust ēin herfylking, og stóðu á toppinum av einum hóli.

26 Tá kallaði Abner til Jó′-ăb-s, og segði, Skal svørðið uppslúka um ævir? veitst tú ikki, at tað vil verða beiskleiki í tí seinna endanum? hvussu leingi skal tað vera tá, áður enn tú ábjóði fólkinum *at* venda aftur frá at fylgja brøðrum sínum?

27 Og Jó′-ăb segði, *Sum* Guð livir, uttan tú hevðirt talað, vissuliga tá um morgunin hevði fólkið farið upp hvør *og* ēin frá at fylgja bróður sínum.

28 So Jó′-ăb blásti ein lúður, og alt fólkið stóðu stillir, og eltu eftir Ísrael ei meira, eiheldur bardust teir meira.

29 Og Abner og menn hansara gingu alla ta náttina ígjøgnum slættan, og fóru yvirum Jordan, og fóru ígjøgnum alt Bĭth′-rōn, og teir komu til Mă-há′-nă-ĭm.

30 Og Jó′-ăb vendi aftur frá at fylgja Abneri: og tá ið hann hevði savnað alt fólkið saman, vantaðu tað av tænarum Dávids nítjan menn og Ás′-ă-hĕl.

31 Men tænararnir hjá Dávidi høvdu sligið av Benjamin, og av monnunum hjá Abneri, *so at* trý hundrað og trísinstjúgu menn doyðu.

32 ¶ Og teir tóku upp Ás′-ă-hĕl, og jarðaðu hann í gravhýsi faðirs hansara, sum *var í* Beth-lehem. Og Jó′-ăb og menn hansara fóru alla náttina, og teir komu til Hē′-brōn við dagslýsing.

KAPITUL 3

NÚ, tað var leingi kríggj ímillum Sauls hús og Dávids hús: men Dávid vaks sterkari og sterkari, og Sauls hús vaks veikari og veikari.

2 ¶ Og innat Dávidi vórðu synir føddir í Hē′-brōn: og hansara frumborni var Amnon, av Ăhĭn′-ō-ăm-i, Jĕz-rēēl-ĭt-ĭnn′-uni;

3 Og hansara annar, Chĭ′-lĕ-ăb, av Ā′-bĭ-gāīl-i, konu Ná′-băl-s Carmelita; og hin triðji, Ăb′-să-lōm,

sonur Má′-ă-chŭh, dóttur Tăl′-maî-s kongs av Gē′-sjūr;
4 Og hin fjórði, Ăd-ō-nī′-jăh, sonur Hăg′-gĭth-ar; og hin fimti, Sjĕph-ăt′-jăh, sonur Á′-bĭ-tăl-ar;
5 Og hin sætti, Ĭ′-thrē-ăm, viðˆ Ēg′-lŭh, konu Dávids. Hesir vórðu føddir til Dávids í Hē′-brŏn.
6 ¶ Og tað bar á, meðan tað var kríggj ímillum Sauls hús og Dávids hús, at Abner gjørdi seg sjálvan sterkan fyri Sauls hús.
7 Og Saul hevði eina medkonu, hvørs navn *var* Rĭz′-păh, dóttir Aî′-ăh: og *Ísj′-bō-sjĕth* segði til Abners, Hvørsvegna ert tú farin inn til medkonu faðirs míns?
8 Tá varð Abner sera vreiður vegna orða Ísj′-bō-sjĕth-s, og segði, *Eri* eg eitt hunds-høvur, sum ímóti Judah sýni blídni henda dag at húsi Sauls, faðirs tíns, fyri brøðrum hans, og fyri vinum hans, og havi ikki flýggjað teg inn í hond Dávids, at tú ásakart meg í dag við einum feili viðvíkjandi hesi kvinnu?
9 Soleiðis geri Guð við Abner, og meira við, uttan, eins og HARRIN hevur svorið fyri Dávidi, enntá soleiðis geri eg við hann;
10 At umseta kongadømið frá húsi Sauls, og at seta upp hásæti Dávids yvir Ísrael og yvir Judah, frá Dán enntá til Bēēr′-sjĕ-bŭ.
11 Og hann kundi ikki svara Abneri eitt orð aftur, av tí at hann óttaðist hann.
12 ¶ Og Abner sendi sendiboðar til Dávids sína vegna, sigandi, Hvørs *er* landið? sigandi *eisini,* Ger títt bandalag við meg, og sí, hond mín *skal vera* við tær, til at føra íkring alt Ísrael at tær.
13 ¶ Og hann segði, Gott; eg vil gera eitt bandalag við teg: men ēitt ting krevji eg av tær, tað er, Tú skalt ikki síggja andlit mítt, uttan tú fyrst komi við Michal, dóttur Sauls, tá ið tú kemurt at síggja andlit mítt.
14 Og Dávid sendi sendiboðar til Ĭsj′-bŏ-sjĕth-s Sauls sonar, sigandi, Flýggja *mær* konu mína Michal, sum eg trúlovaði til mín fyri eitt hundrað forhúðir hjá Philistunum.
15 Og Ĭsj′-bŏ-sjĕth sendi, og tók hana frá manni *hennara, enntá* frá Phăl′-tī-ĕl-i Lá′-ĭsj syni.
16 Og maður hennara fór við henni ávegis grátandi við henni til Bă-hū′-rĭm. Tá segði Abner við hann, Far, vend aftur. Og hann vendi aftur.
17 ¶ Og Abner hevði samskifti við hinar elstu av Ísrael, sigandi, Tit søktu eftir Dávidi í umlidnum tíðum *til at vera* kongur yvir tykkum:
18 So nú, gerið *tað:* tí at HARRIN hevur talað um Dávid, sigandi, Viðˆ hondini á tænara mínum Dávidi vil eg frelsa fólk mítt Ísrael út úr hondini á Philistunum, og út úr hondini á øllum teirra fíggindum.
19 Og Abner eisini talaði í oyruni á Benjamini: og Abner fór eisini at tala í oyruni á Dávidi í Hē′-brŏn alt sum tóktist gott fyri Ísrael, og sum tóktist gott fyri øllum húsi Benjamins.
20 So Abner kom til Dávids til Hē′-brŏn, og tjúgu menn við honum. Og Dávid gjørdi Abneri og monnunum, sum við honum *vóru,* eina veitslu.
21 Og Abner segði við Dávid, Eg vil reisast og fara, og vil savna alt Ísrael at harra mínum konginum, at teir mega gera eitt bandalag við teg, og at tú mást ríkja yvir øllum sum hjarta títt tráar. Og Dávid sendi Abner avstað; og hann fór í friði.
22 ¶ Og sí, tænarar Dávids og Jó′-ăb-s komu frá *at elta* eina fylking, og førdu inn ein miklan fong við sær: men Abner *var* ikki við

Dávidi í Hē´brŏn; tí at hann hevði sent hann avstað, og hann var farin í friði.

23 Tá ið Jó´ăb, og alt herliðið sum *var* við honum, vóru komnir, taldu teir Jó´ăb-i, sigandi, Abner Nērs sonur kom til kongsins, og hann hevur sent hann avstað, og hann er farin í friði.

24 Tá kom Jó´ăb til kongsins, og segði, Hvat hevurt tú gjørt? sí, Abner kom at tær; hví *er* tað, *at* tú hevurt sent hann avstað, og hann er heilt farin?

25 Tú kennirt Abner Nērs son, at hann kom til *tess* at snýta teg, og at kenna tína faring út og tína koming inn, og at vita alt sum tú gert.

26 Og tá ið Jó´ăb var komin út frá Dávidi, sendi hann sendiboðar eftir Abneri, sum førdu hann aftur frá Sĭ´răh brunni: men Dávid vitsti *tað* ikki.

27 Og tá ið Abner var komin aftur til Hē´brŏn, tók Jó´ăb hann til viks í portrinum at tala við hann stillisligani, og sló hann har undir hitt fimta *rivjaþeinið,* at hann doyði, fyri blóð Ás´ă-hĕl-s, bróður síns.

28 ¶ Og aftaná, tá ið Dávid hoyrdi *tað,* segði hann, Eg og kongadømi mítt *eru* sakleysir frammi fyri HARRANUM um ævir frá blóði Abners Nērs sonar:

29 Lat tað hvíla á høvdi Jó´ăb-s, og á øllum húsi faðirs hans; og lat tað ikki tróta frá húsi Jó´ăb-s ēin sum hevur eitt útflot, ella sum er ein spitalskur, ella sum lenar á ein stav, ella sum fellur á svørðið, ella sum vantar breyð.

30 So Jó´ăb og Á´bĭ-sjāi, bróðir hansara, vógu Abner, av tí at hann hevði vigið bróður teirra, Ás´ă-hĕl, í Gibeon í bardaganum.

31 ¶ Og Dávid segði til Jó´ăb-s, og til alt fólkið sum við honum *vóru,* Skræðið klæðir tykkara, og gyrðið tykkum við sekkjaklæði, og harmið frammanfyri Abneri. Og kong Dávid *sjálvur* fylgdi børuni.

32 Og teir jarðaðu Abner í Hē´brŏn: og kongur lyfti upp rødd sína, og græt við grøv Abners; og alt fólkið græt.

33 Og kongur harmaði um Abner, og segði, Doyði Abner sum ein dári doyr?

34 Tínar hendur *vóru* ikki bundnar, ella tínir føtur settir í fótjørn: eins og ein maður fellur frammi fyri vondum monnum, *soleiðis* felst tú. Og alt fólkið græt aftur yvir hann.

35 Og tá ið alt fólkið kom at fáa Dávid at eta mat, meðan tað var enn dagur, svór Dávid, sigandi, Soleiðis geri Guð við meg, og meira við, um eg bragdi breyð, ella nakað annað, til sólin verði niðri.

36 Og alt fólkið legði merki *til tess,* og tað toknaði teimum: eins og hvatsumhelst *ið* kongur gjørdi toknaði øllum fólkinum.

37 Tí at alt fólkið og alt Ísrael skilti tann dagin, at tað var ikki av kongi at vega Abner Nērs son.

38 Og kongur segði við tænarar sínar, Vita tit ikki, at tað er ein prinsur og ein mikil maður fallin henda dag í Ísrael?

39 Og eg *eri* henda dag veikur, hóast salvaður kongur; og hesir menn, Zĕr-ū´jŭh synir, *veri* ov torførir hjá mær: HARRIN skal endurgjalda geraranum av illum samsvarandi við vondsku hansara.

KAPITUL 4

OG tá ið sonur Sauls hoyrdi, at Abner var deyður í Hē´brŏn, vórðu hendur hansara máttleysar, og allir Ísraelitarnir vórðu órógvaðir.

2 Og sonur Sauls hevði tveir menn *sum vóru* høvuðsmenn hjá liðum: navnið hjá tí ēina *var*

Bā′-ă-năh, og navnið hjá hīnum Rē′-chăb, synirnir hjá Rimmon, einum Bēēr-ô-thīt′-a, av børnum Benjamins: (tí at Bēēr′-ōth eisini varð roknað til Benjamins:
3 Og Bēēr-ô-thīt′-arnir flýddu til Gīt-tā′-īm, og vóru útisetar har inntil henda dag.)
4 Og Jónathan, sonur Sauls, hevði ein son, *sum var* lamin til fóta *sína*. Hann var fimm ára gamalur, tá ið tíðindini komu um Saul og Jónathan úr Jēz′-rēēl, og hansara fostra tók hann upp, og flýddi: og tað bar á, sum hon gjørdi skjótt av at flýggja, at hann datt, og gjørdist lamin. Og navn hansara *var* Mē-phī′-bō-sjēth.
5 Og synir Rimmons Bēēr-ô-thīt′-a, Rē′-chăb og Bā′-ă-năh, fóru, og komu um hita dagsins til húsar Īsj′-bō-sjēth-s, sum lá á eini song um middag.
6 Og teir komu hagar inn í miðju hússins, *sum um* teir vildu havt heintað hveiti; og teir slógu hann undir hitt fimta *rivjabeinið:* og Rē′-chăb og Bā′-ă-năh, bróðir hansara, komust undan.
7 Tí at tá ið teir komu inn í húsið, lá hann á song síni í seingjarkamari sínum, og teir slógu hann, og vógu hann, og avhøvdaðu hann, og tóku høvur hansara, og sluppu sær avstað ígjøgnum slættan alla nátt.
8 Og teir førdu høvur Īsj′-bō-sjēth-s at Dávidi til Hē′-brōn, og søgdu til kongsins, Sí høvur Īsj′-bō-sjēth-s, sonar Sauls, fígginda tíns, sum søkti lív títt; og HARRIN hevur hevnt mín harra kongin henda dag á Sauli, og á sáði hans.
9 ¶ Og Dávid svaraði Rē′-chăb-i og Bā′-ă-năh, bróður hansara, sonum Rimmons Bēēr-ô-thīt′-a, og segði við teir, *Sum* HARRIN livir, sum hevur endurloyst mína sál burtur úr øllum mótburði,
10 Tá ið ēin segði mær frá, sigandi, Sí, Saul er deyður, hugsandi at hava borið góð tíðindir, *tá* tók eg hald á honum, og vó hann í Ziklag, sum *hugsaði,* at eg vildi havt givið honum eitt endurgjald fyri tíðindir hans:
11 Hvussu mikið meira, tá ið vondir menn hava vigið ein rættvísan persón í egna húsi hans uppiá song hans? skal eg ikki tí nú krevja blóð hans av tykkara hond, og taka tykkum burtur frá jørðini?
12 Og Dávid ábjóðaði sínum ungu monnum, og teir vógu teir, og skóru av teirra hendur og teirra føtur, og hongdu *teir* upp yvir hylinum í Hē′-brōn. Men teir tóku høvur Īsj′-bō-sjēth-s, og jarðaðu *tað* í gravhýsi Abners í Hē′-brōn.

KAPITUL 5

TÁ komu allar ættargreinir Ísraels til Dávids at Hē′-brōn, og talaðu, sigandi, Sí, vit *eru* bein títt og kjøt títt.
2 Eisini í lidnari tíð, tá ið Saul var kongur yvir okkum, vart tú hann sum leiddirt út og førdirt inn Ísrael: og HARRIN segði til tín, Tú skalt føða fólk mítt Ísrael, og tú skalt vera ein høvuðsmaður yvir Ísrael.
3 So allir teir elstu av Ísrael komu til kongsins til Hē′-brōn; og kong Dávid gjørdi eitt bandalag við teir í Hē′-brōn frammi fyri HARRANUM: og teir salvaðu Dávid *til* kong yvir Ísrael.
4 ¶ Dávid *var* tríati ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja, *og* hann ríkti fýrati ár.
5 Í Hē′-brōn ríkti hann yvir Judah sjey ár og seks mánaðir: og í Jerusalem ríkti hann tríati og trý ár yvir øllum Ísrael og Judah.
6 ¶ Og kongur og hansara menn fóru til Jerusalem at Jēb-ū-sīt′-unum, íbúgvum landsins: sum talaðu við Dávid, sigandi, Uttan

tú taki burt hinar blindu og lamnu, skalt tú ei koma inn higar: hugsandi, Dávid kann ikki koma inn higar.

7 Hóast hetta, Dávid tók hervirki Zions: tað sama *er* staður Dávids.

8 Og Dávid segði á tí degi, Hvørsumhelst *ið* sleppur *sær* upp til rennuna, og slær Jëb-ū-sīt´-arnar, og hinar lamnu og hinar blindu, *sum eru* hataðir av sál Dávids, *hann skal vera hægstur og høvuðsmaður*. Hvørsvegna teir søgdu, Teir blindu og teir lamnu skulu ikki koma inn í húsið.

9 So Dávid dvaldist í festninginum, og kallaði hann stað Dávids. Og Dávid bygdi runt umkring frá Mīl´-lō og inneftir.

10 Og Dávid fór áfram, og vaks mikil, og HARRIN Guð herliðanna *var* við honum.

11 ¶ Og Hiram kongur av Týrus sendi ørindrekar til Dávids, og sedristrø, og træsmiðir, og múrarar: og teir bygdu Dávidi eitt hús.

12 Og Dávid varnaðist, at HARRIN hevði grundfest hann kong yvir Ísrael, og at hann hevði upphevjað kongadømi hansara fyri fólks síns Ísraels skuld.

13 ¶ Og Dávid tók *sær* fleiri medkonur og ektakonur úr Jerusalem, eftir *at* hann var komin frá Hē´-brŏn: og tað vórðu enn synir og døtur fødd til Dávids.

14 Og hesi *veri seg* nøvnini hjá teimum, sum vórðu fødd honum í Jerusalem; Sjăm´-mū-ă, og Sjō´-băb, og Náthan, og Sálomon,

15 Ĭb´-hâr eisini, og Ē-lī´-sjū-ă, og Nĕph´-ĕg, og Já´-phī-ă,

16 Og Ē-lī-sjá´-mă, og Ē-lī´-ă-dă, og Ê-līph´-ă-lĕt.

17 ¶ Men tá ið Philistarnir hoyrdu, at teir høvdu salvað Dávid *til* kong yvir Ísrael, komu allir Philistarnir upp at søkja Dávid; og Dávid hoyrdi *harum*, og fór oman til virkið.

18 Philistarnir eisini komu og breiddu seg í dali Rē´-phă-īm-s.

19 Og Dávid spurdi *seg* fyri av HARRANUM, sigandi, Skal eg fara upp til Philistarnar? vilt tú flýggja teir inn í hond mína? Og HARRIN segði við Dávid, Far upp: tí at eg vil ivaleyst flýggja Philistarnar inn í hond tína.

20 Og Dávid kom til Bā´-ăl-pĕ-rā´-zīm, og Dávid sló teir har, og segði, HARRIN hevur brotið fram uppá mínar figgindar frammi fyri mær, eins og skarðið av vøtnum. Tí kallaði hann navnið á tí plássinum Bā´-ăl-pĕ-rā´-zīm.

21 Og har eftirlótu teir myndir sínar, og Dávid og hansara menn brendu tær.

22 ¶ Og Philistarnir komu upp enn eina ferð, og breiddu seg í Rē´-phă-īm-s dalinum.

23 Og tá ið Dávid fregnaði av HARRANUM, segði hann, Tú skalt ei fara upp; *men* heinta eina kringferð aftanfyri teir, og kom uppá teir yvir av morberjatrøunum.

24 Og lat tað verða, tá ið tú hoyrirt ljóðið av eini faring í toppunum av morberjatrøunum, at tú tá skalt summa teg: tí at tá skal HARRIN fara út undan tær, at sláa herliðið hjá Philistunum.

25 Og Dávid so gjørdi, eins og HARRIN hevði áboðið honum; og sló Philistarnar frá Gē´-bă inntil tú komi til Gā´-zĕr.

KAPITUL 6

AFTUR savnaði Dávid saman allar *hinar* útvaldu *menn* Ísraels, tríati túsund.

2 Og Dávid reistist, og fór við øllum fólkinum sum *vóru* við honum, frá Bá´-ă-lē av Judah, at føra upp haðani frá ørk Guðs, hvørs navn er kallað við navni HARRA herliðanna, sum býr *ímillum* chêr-ū-bīm´-arnar.

3 Og teir settu ørk Guðs uppá eina nýggja kerru, og førdu hana

út úr húsi Ă-bĭn′-ă-dăb-s, sum *var* í Gĭ-bē′-ŭh: og ŬZ′-zăh og Á′-hĭ-ō, synir Ă-bĭn′-ă-dăb-s, óku ta nýggju kerruna.

4 Og teir førdu hana út úr húsi Ă-bĭn′-ă-dăb-s, sum *var* í Gĭ-bē′-ŭh, í fylgd við ørk Guðs: og Á′-hĭ-ō fór undan ørkini.

5 Og Dávid og alt hús Ísraels spældu frammi fyri HARRANUM á alskyns *ljóðførir, gjørd úr* granntræi, enntá á hørpur, og á psaltrar, og á tamburĭnur, og á kornettir, og á skálatrummur.

6 ¶ Og tá ið teir komu til treskigólv Ná′-chŏn-s, setti ŬZ′-zăh fram *sína hond* til arkar Guðs, og tók hald á henni; tí at oksarnir ristu *hana*.

7 Og HARRANS firtni varð kynd ímóti ŬZ′-zăh; og Guð sló hann har fyri *hansara* villfaring; og har hann doyði hjá ørk Guðs.

8 Og Dávid var misnøgdur, av tí at HARRIN hevði gjørt eitt skarð uppá ŬZ′-zăh: og hann kallaði navnið á plássinum Pē′-rĕz-ŭz′-zăh til henda dag.

9 Og Dávid var ræddur fyri HARRANUM tann dagin, og segði, Hvussu skal ørk HARRANS koma til mín?

10 So Dávid vildi ikki burtflyta ørk HARRANS til sín inn í stað Dávids: men Dávid bar hana til viks inn í hús Ō′-bĕd-ē′-dóm-s Gĭt-tĭt′-a.

11 Og HARRANS ørk helt áfram í húsi Ō′-bĕd-ē′-dóm-s Gĭt-tĭt′-a tríggjar mánaðir: og HARRIN vælsignaði Ō′-bĕd-ē′-dóm, og alt húshald hans.

12 ¶ Og tað varð sagt Dávidi kongi, sigandi, HARRIN hevur vælsignað hús Ō′-bĕd-ē′-dóm-s, og alt sum *tilhoyrir* honum, uppá grund av ørk Guðs. So Dávid fór og førdi upp ørk Guðs frá húsi Ō′-bĕd-ē′-dóm-s inn í stað Dávids við frøi.

13 Og tað varð *so,* at tá ið teir, sum bóru ørk HARRANS, høvdu gingið seks fet, sláturofraði hann oksar og gøðingar.

14 Og Dávid dansaði frammi fyri HARRANUM við allari *sini* megi; og Dávid *var* gyrdur við eini lín ê-phōd′-u.

15 So Dávid og alt hús Ísraels førdu upp ørk HARRANS við rópan, og við lúðursljóðinum.

16 Og sum ørk HARRANS kom inn í stað Dávids, hugdi Michal, dóttir Sauls, ígjøgnum ein glugga, og sá kong Dávid leypandi og dansandi frammi fyri HARRANUM; og hon vanvirdi hann í hjarta sínum.

17 ¶ Og teir førdu inn ørk HARRANS, og settu hana í pláss hans, í miðjum tabernaklinum sum Dávid hevði sligið upp til hennara: og Dávid ofraði brennioffurˇ og friðoffurˇ frammi fyri HARRANUM.

18 Og so skjótt sum Dávid hevði lokið við at ofra brennioffurˇ og friðoffurˇ, vælsignaði hann fólkið í navni HARRA herliðanna.

19 Og hann skifti millum alt fólkið, *enntá* millum alla mannfjøld Ísraels, eins væl til kvennanna sum manna*nna,* til hvørs *og* eins eina breyðkøku, og eitt gott stykki *av kjøti,* og eina karaflu *av víni.* So alt fólkið fór avstað, hvør *og* ēin til húss síns.

20 ¶ Tá vendi Dávid aftur at vælsigna húshald sítt. Og Michal, dóttir Sauls, kom út at møta Dávidi, og segði, Hvør dýrdsamur var kongur Ísraels í dag, sum avhuldi seg sjálvan í dag í eygunum á tænastumoyggjum tænara sína, sum ēin av hinum fáfongdu feløgunum skammloysiligani avhylur seg sjálvan!

21 Og Dávid segði við Michal, *Tað var* frammi fyri HARRANUM, sum valdi meg framum faðir tín, og framum alt hús hansara, at

útnevna meg *til* stjórnara yvir fólki HARRANS, yvir Ísrael: tí vil eg spæla frammi fyri HARRANUM.
22 Og eg vil enn vera meiri ønskriligur enn soleiðis, og vil vera niðarligur í míni egnu eygsjón: og av tænastumoyggjunum, sum tú hevurt talað um, av teimum skal eg verða hildin í heiðuri.
23 Tí hevði Michal, dóttir Sauls, einkið barn at degi deyða síns.

KAPITUL 7

OG tað bar á, tá ið kongur sat í húsi sínum, og HARRIN hevði givið honum hvílu runt umkring frá øllum fíggindum hans;
2 At kongur segði við Náthan prophet, Síggj nú, eg dvøljist í einum húsi av sedris*viði,* men ørk Guðs dvølist fyri innan tjalddúka.
3 Og Náthan segði til kongsins, Far, ger alt sum *er* í hjarta tínum; tí at HARRIN *er* við tær.
4 ¶ Og tað bar á ta náttina, at orð HARRANS kom at Náthani, sigandi,
5 Far og sig tænara mínum Dávidi, Svá sigur HARRIN, Skalt tú byggja mær eitt hús til mín at búgva í?
6 Hvar ið eg havi ikki búð í *nøkrum* húsi síðan ta tíð, sum eg førdi upp børn Ísraels út úr Egyptalandi, enntá til henda dag, men havi gingið í einum tjaldi og í einum tabernakli.
7 Í øllum *teimum plássum,* í hvørjum eg havi gingið við øllum børnum Ísraels, talaði eg eitt orð við nakra av ættargreinum Ísraels, hvørjum eg skipaði at føða fólk mítt Ísrael, sigandi, Hví byggja tit ikki mær eitt hús av sedris*viði?*
8 Nú tessvegna, soleiðis skalt tú siga við tænara mín Dávid, Svá sigur HARRI herliðanna, eg tók teg frá seyðabyrginum, frá at fylgja seyðinum, til at vera stjórnari yvir fólki mínum, yvir Ísrael:
9 Og eg var við tær hvagarsumhelst tú fórt, og havi skorið av allar tínar fíggindar út úr eygsjón tíni, og havi gjørt tær eitt mikið navn, líkt navni hinna miklu *manna* sum *eru* á jørðini.
10 Harafturat vil eg útnevna eitt pláss til fólk mítt Ísrael, og vil gróðurseta teir, at teir mega búgva í einum plássi síns egna, og flyta ei meira; eiheldur skulu vondskunnar børn níva teir meira, eins og áðurfyrr,
11 Og eins og síðan ta tíð sum eg ábjóðaði dómarar *til at vera* yvir fólki mínum Ísrael, og havi elvt tær at hvíla frá øllum tínum fíggindum. Eisini HARRIN sigur tær, at hann vil gera tær eitt hús.
12 ¶ Og tá ið dagar tínir verði uppfyltir, og tú skalt sova hjá fedrum tínum, vil eg seta upp sáð títt eftir teg, sum skal útganga út úr innangoymslum tínum, og eg vil grundfesta kongadømi hans.
13 Hann skal byggja eitt hús til navns míns, og eg vil grundfesta trónu kongadømis hans um ævir.
14 Eg vil vera faðir hansara, og hann skal vera sonur mín. Um hann fremji misgerð, vil eg aga hann við stavi manna, og við fleingjum mannabarnanna:
15 Men mín miskunn skal ei víkja burt frá honum, eins og eg tók *hana* frá Sauli, hvønn eg koyrdi burt undan tær.
16 Og hús títt og kongadømi títt skal vera grundfest um ævir frammi fyri tær: tín tróna skal vera grundfest um ævir.
17 Samsvarandi við øll hesi orð, og samsvarandi við alla hesa sjón, soleiðis talaði Náthan við Dávid.
18 ¶ Tá fór Dávid kongur inn, og sat frammi fyri HARRANUM,

og hann segði, Hvør *eri* eg, O Harri GUÐ? og hvat *er* hús mítt, at tú hevurt ført meg higartil?

19 Og hetta var tó eitt lítið ting í eygsjón tíni, O Harri GUÐ; men tú hevurt talað eisini um hús tænara tíns til langa stund *ið* koma skal. Og *er* hetta háttarlag mans, O Harri GUÐ?

20 Og hvat kann Dávid siga meira við teg? tí at tú, Harri GUÐ, kennirt tænara tín.

21 Fyri orðs tíns skuld, og samsvarandi við egna hjarta títt, hevurt tú gjørt øll hesi miklu ting, at fáa tænara tín *at* vita *tey*.

22 Hvørsvegna tú ert mikil, O HARRI Guð: tí at *tað er* eingin líka *sum* tú, eiheldur *er tað nakar* Guð umframt teg, samsvarandi við alt sum vit hava hoyrt við oyrum várum.

23 Og hvør ēin*stǿk* tjóð á jørðini *er* líka *sum* fólk títt, *enntá* líka *sum* Ísrael, hvørjar Guð fór at endurloysa til eitt fólk til sín sjálvs, og at gera sær eitt navn, og at gera fyri tykkum mikil ting og øgilig, fyri land títt, frammi fyri fólki tínum, sum tú endurloystirt til tín frá Egyptalandi, *frá* tjóðunum og gudum teirra?

24 Tí at tú hevurt staðfest til tín sjálvs fólk títt Ísrael *at vera* eitt fólk at tær um ævir: og tú, HARRI, ert vorðin Guð teirra.

25 Og nú, O HARRI Guð, orðið, sum tú hevurt talað viðvíkjandi tænara tínum, og viðvíkjandi húsi hansara, grundfest *tað* um ævir; og ger sum tú hevurt sagt.

26 Og lat navn títt verða stórgjørt um ævir, sigandi, HARRI herliðanna *er* Guð˜ yvir Ísrael: og lat hús tænara tíns Dávids verða grundfest frammi fyri tær.

27 Tí at tú, O HARRI herliðanna, Guð Ísraels, hevurt opinberað fyri tænara tínum, sigandi, Eg vil byggja tær eitt hús: tí hevur tænari tín funnið í hjarta sínum at biðja hesa bøn at tær.

28 Og nú, O Harri GUÐ, tú *ert* tann Guð, og tíni orð veri sonn, og tú hevurt fyrijáttað hesa góðsku at tænara tínum:

29 Tessvegna nú, lat tað tokna tær at signa hús tænara tíns, at tað má halda áfram um ævir frammi fyri tær: tí at tú, O Harri GUÐ, hevurt talað *tað:* og við tíni signing lat hús tænara tíns vera signað um ævir.

KAPITUL 8

OG eftir hetta bar tað á, at Dávid sló Philistarnar, og undirlegði teir: og Dávid tók Mĕth-ĕg-ăm-măh út úr hond Philistanna.

2 Og hann sló Móab, og mátaði teir við eini *máti*linju, kastandi teir niður til jarðarinnar; enntá við tveimum linjum mátaði hann til at taka av lívi, og við ēinari fullari linju til at halda á lívi. Og *so* gjørdust Móabitarnir tænarar Dávids, *og* bóru gávur.

3 ¶ Dávid sló eisini Hăd-ă-dē-zĕr, son Rē-hŏb-s, kong av Zō-băh, sum hann fór at endurvinna mark sítt við ánna Ēv-phrā-tēs.

4 Og Dávid tók frá honum eitt túsund *vagnar,* og sjey hundrað hestmenn, og tjúgu túsund fótmenn: og Dávid hælsinu*kvetti* allar vagn*hest*arnar, men goymdi av teimum *til* eitt hundrað vagnar.

5 Og tá ið Sýriulendingarnir úr Damascus komu at dugna Hăd-ă-dē-zĕr-i kongi av Zō-băh, vá Dávid av Sýriulendingunum tvey og tjúgu túsund menn.

6 Tá setti Dávid setulið˜ í Sýriu av Damascus: og Sýriulendingarnir gjørdust tænarar fyri Dávidi, *og* komu við gávum. Og HARRIN varðveitti Dávid hvagarsumhelst hann fór.

7 Og Dávid tók skildirnar av gulli, sum vóru á tænarum Hăd-

ă-dĕ´-zĕr-s, og førdi teir til Jerusalem.

8 Og frá Bē´-tăh, og frá Bĕ-rō´-thâi, staðum hjá Hăd-ă-dē´-zĕr-i, tók Dávid kongur avbera nógvan messing.

9 ¶ Tá ið Tó´-ī kongur av Há´-măth hoyrdi, at Dávid hevði sligið alt herliðið hjá Hăd-ă-dĕ´-zĕr-i,

10 Tá sendi Tó´-ī Jóram, son sín, at Dávid kongi, at heilsa honum, og at vælsigna hann, av tí at hann hevði barst ímóti Hăd-ă-dĕ´-zĕr-i, og sligið hann: tí at Hăd-ă-dĕ´-zĕr hevði bardagar við Tó´-ă. Og *Jóram* førdi við sær íløt av silvuri, og íløt av gulli, og íløt av messing:

11 Hvørji eisini kong Dávid vígdi at HARRANUM, við silvurinum og gulli*num* sum hann hevði vígt av øllum tjóðum sum hann undirlegði;

12 Av Sýriu, og av Móab, og av børnum Ammons, og av Philistunum, og av Ā´-mâ-lĕk, og av herfongi Hăd-ă-dē´-zĕr-s, sonar Rē´-hŏb-s, kongs av Zō´-băh.

13 Og Dávid vann *sær* eitt navn, tá ið hann kom aftur frá at sláa Sýriulendingarnar í salts-dalinum, *verandi* átjan túsund *mans*.

14 ¶ Og hann setti setuliðˇ í Ē´-dóm; út gjøgnum alt Ē´-dóm setti hann setuliðˇ, og allir teir úr Ē´-dóm gjørdust tænarar Dávids. Og HARRIN varðveitti Dávid hvagarsumhelst hann fór.

15 Og Dávid ríkti yvir øllum Ísrael; og Dávid útinti dóm og rættvísi at øllum fólki sínum.

16 Og Jó´-ăb Zĕr-ŭ´-jăh sonur *var* yvir herliðinum; og Jē-hō´-sjâ-phăt Á´-hĭ-lŭd-s sonur *var* skrásetari;

17 Og Zā´-dŏk Á´-hĭ-tŭb-s sonur, og Ă-hĭm´-ĕ-lĕch Ā´-bĭ-ă-thâr-s sonur, *vóru* prestarnir; og Sĕ-râ´-ăh *var* skrivarin;

18 Og Bĕ-nâi´-ăh Jē-hôi´-ă-dă sonur *var yvir* bæði Chĕr-ē-thĭt´-unum og Pĕ-lē-thĭt´-unum; og synir Dávids vóru fremstir stjórnarar.

KAPITUL 9

OG Dávid segði, Er tað enn nakar sum er eftir av húsi Sauls, at eg má sýna honum blídni fyri Jónathans skuld?

2 Og *har var* av húsi Sauls ein tænari, hvørs navn *var* Zí´-bă. Og tá ið teir høvdu kallað hann at Dávidi, segði kongur við hann, *Ert* tú Zí´-bă? Og hann segði, Tín tænari *er hann*.

3 Og kongur segði, *Er* tað ikki enn nakar av húsi Sauls, at eg má sýna blídni Guðs at honum? Og Zí´-bă segði við kong, Jónathan hevur enn ein son, *sum er* lamin í fótum *sínum*.

4 Og kongur segði við hann, Hvar *er* hann? Og Zí´-bă segði við kong, Sí, hann *er* í húsi Má´-chĭr-s Ăm´-mĭ-ĕl-s sonar, í Lō´-dĕ-bâr.

5 ¶ Tá sendi Dávid kongur, og heintaði hann út úr húsi Má´-chĭr-s Ăm´-mĭ-ĕl-s sonar, frá Lō´-dĕ-bâr.

6 Nú, tá ið Mĕ-phī´-bō-sjĕth, sonur Jónathans, sonar Sauls, var komin at Dávidi, fell hann á andlit sítt, og inti virðingarótta. Og Dávid segði, Mĕ-phī´-bō-sjĕth. Og hann svaraði, Sí tænara tín!

7 ¶ Og Dávid segði við hann, Óttast ikki: tí at eg vil vissuliga sýna tær blíðsemi fyri Jónathans, faðir tíns, skuld, og vil endurbøta tær alt land Sauls, faðirs tíns; og tú skalt eta breyð við borð mítt áframhaldandi.

8 Og hann boygdi seg, og segði, Hvat *er* tænari tín, at tú skuldirt hugt uppá ein slíkan deyðan hund sum eg *eri?*

9 ¶ Tá kallaði kongur til Zí´-bă, tænara Sauls, og segði við hann, Eg havi givið syni meistara tíns alt sum hoyrir til Sauls og til alt hús hansara.

10 Tú tessvegna, og synir tínir, og tænarar tínir, skulu pløga jørðina fyri hann, og tú skalt føra

inn *ávøkstirnar,* at sonur meistara tíns má hava mat at eta: men Mĕ-phī´-bŏ-sjĕth, sonur meistara tíns, skal eta breyð allan veg við borð mítt. Nú, Zī´-bă hevði fimtan synir og tjúgu tænarar.

11 Tá segði Zī´-bă við kong, Samsvarandi við alt sum harri mín kongur hevur áboðið tænara sínum, so skal tænari tín gera. Hvat Mĕ-phī´-bŏ-sjĕth-i viðvíkur, *segði kongur,* hann skal eta við borð mítt, sum ēin av sonum kongs.

12 Og Mĕ-phī´-bŏ-sjĕth hevði ein ungan son, hvørs navn *var* Mī´-chă. Og allir, sum búðu í húsi Zī´-bă, *vóru* tænarar at Mĕ-phī´-bŏ-sjĕth-i.

13 So Mĕ-phī´-bŏ-sjĕth búði í Jerusalem: tí hann át áframhaldandi við borð kongsins; og var lamin í báðum fótum sínum.

KAPITUL 10

OG tað bar á eftir hetta, at kongur Ammons barna doyði, og Há´-nŭn, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

2 Tá segði Dávid, Eg vil sýna blídni at Há´-nŭn Náhasj syni, eins og faðir hansara sýndi blídni at mær. Og Dávid sendi til at ugga hann við hendi tænara sína vegna faðir hansara. Og tænarar Dávids komu inn í land Ammons barna.

3 Og prinsar Ammons barna søgdu við Há´-nŭn, harra sín, Hugsart tú, at Dávid ærir faðir tín, at hann hevur sent uggarar at tær? hevur ikki Dávid *heldur* sent tænarar sínar at tær, til at kanna staðin, og at njósna hann út, og at kollrenna hann?

4 Hvørsvegna Há´-nŭn tók tænarar Dávids, og rakaði av ta ēinu helvtina av skeggum teirra, og skar av teirra klæðir í miðjuni, *enntá* til bøllar teirra, og sendi teir avstað.

5 Tá ið teir søgdu Dávidi frá *tí,* sendi hann at møta teimum, av tí at menninir stórliga skammaðust: og kongur segði, Steðgið í Jericho, inntil skegg tykkara verði vaksin, og *so* vendið aftur.

6 ¶ Og tá ið Ammons børn sóu, at teir stinkaðu frammi fyri Dávidi, sendu Ammons børn og leigaðu Sýriulendingarnar úr Bēth-rĕ´-hŏb, og Sýriulendingarnar úr Zŏ´-bă, tjúgu túsund fótmenn, og av Mă´-ă-chăh kongi eitt túsund menn, og av Ĭsj´-tŏb tólv túsund menn.

7 Og tá ið Dávid hoyrdi um *tað,* sendi hann Jó´-ăb, og alt herlið hinna mektigu manna.

8 Og børn Ammons komu út, og stillaðu bardagan í uppstilling við inngongdina av portrinum: og Sýriulendingarnir úr Zŏ´-bă, og úr Rĕ´-hŏb, og Ĭsj´-tŏb, og Mă´-ă-chăh, *vóru* fyri seg sjálvar í akrinum.

9 Tá ið Jó´-ăb sá, at framsíðan av bardaganum var ímóti honum frammanfyri og aftanfyri, valdi hann av øllum úrvals *monnum* Ísraels, og stillaði *teir* í uppstilling ímóti Sýriulendingunum:

10 Og restina av fólkinum flýggjaði hann inn í hond Á´-bĭ-sjaī-s, bróður síns, at hann mátti stilla *teir* í uppstilling ímóti børnum Ammons.

11 Og hann segði, Um Sýriulendingarnir verði ov sterkir hjá mær, so skalt tú hjálpa mær: men um Ammons børn verði ov sterkir hjá tær, so vil eg koma og hjálpa tær.

12 Ver við gott treyst, og latum okkum bera *okkum sum* menn fyri fólk várt, og fyri staðir Guðs várs: og geri HARRIN tað sum honum tykir gott.

13 Og Jó´-ăb dró nær, og fólkið sum við honum *vóru,* at orrustuni ímóti Sýriulendingunum: og teir flýddu frammi fyri honum.

14 Og tá ið Ammons børn sóu,

at Sýriulendingarnir vóru flýddir, tá flýddu teir eisini frammi fyri Á-bī-sjaī, og innfóru inn í staðin. So Jó-ăb vendi aftur frá børnum Ammons, og kom til Jerusalem.

15 ¶ Og tá ið Sýriulendingarnir sóu, at teir vóru slignir frammi fyri Ísrael, savnaðu teir seg saman.

16 Og Hăd-ă-rē-zĕr sendi, og førdi út Sýriulendingarnar sum *vóru* handan ánna: og teir komu til Hē-lăm; og Sjō-băch, høvuðsmaðurin av herliði Hăd-ă-rē-zĕr-s, *fór* undan teimum.

17 Og tá ið tað varð sagt Dávidi, savnaði hann alt Ísrael saman, og fór yvirum Jordan, og kom til Hē-lăm. Og Sýriulendingarnir stillaðu seg sjálvar í uppstilling ímóti Dávidi, og bardust við hann.

18 Og Sýriulendingarnir flýddu frammi fyri Ísrael; og Dávid vá *menninar av* sjey hundrað vagnum hjá Sýriulendingunum, og fjøruti túsund hestmenn, og sló Sjō-băch, høvuðsmannin av herliði teirra, sum doyði har.

19 Og tá ið allir kongarnir, *sum vóru* tænarar fyri Hăd-ă-rē-zĕr-i, sóu, at teir vóru slignir frammi fyri Ísrael, stiftaðu teir frið við Ísrael, og tæntu teimum. So Sýriulendingarnir óttaðust at hjálpa Ammons børnum meira.

KAPITUL 11

OG tað bar á, eftir *at* árið var útrunnið, við ta tíðina tá ið kongar fara út *til orrustu,* at Dávid sendi Jó-ăb, og tænarar sínar við honum, og allan Ísrael; og teir oyddu børn Ammons, og kringsettu Răb-băh. Men Dávid dvaldi enn í Jerusalem.

2 ¶ Og tað bar á í eini aftanstíð, at Dávid reistist oman av song síni, og gekk uppiá takinum av kongshúsinum: og frá takinum sá hann eina kvinnu, tváandi sær; og kvinnan *var* sera vøkur á at líta.

3 Og Dávid sendi og fregnaðist eftir kvinnuni. Og *ēin* segði, *Er* ikki henda Băth-sjĕ-bă, dóttir Ē-lī-ăm-s, ektakona Ū-rī-ăh Hittita?

4 Og Dávid sendi sendiboðar, og tók hana; og hon kom inn at honum, og hann lá við henni; tí at hon var reinsað frá óreinleika sínum: og hon vendi aftur at húsi sínum.

5 Og kvinnan gat, og sendi og segði Dávidi frá, og segði, Eg *eri* við barn.

6 ¶ Og Dávid sendi til Jó-ăb-s, *sigandi,* Send mær Ū-rī-ăh Hittita. Og Jó-ăb sendi Ū-rī-ăh til Dávids.

7 Og tá ið Ū-rī-ăh var komin at honum, kravdi Dávid *av honum* hvussu Jó-ăb-i gekst, og hvussu fólkinum gekst, og hvussu kríggið framgekk.

8 Og Dávid segði til Ū-rī-ăh, Far oman til húsar tíns, og tváa føtur tínar. Og Ū-rī-ăh fór avstað út úr kongshúsinum, og tað fylgdi honum ein nøgd *av mati* frá kongi.

9 Men Ū-rī-ăh svav við dyrnar á kongshúsinum við øllum tænarum harra síns, og fór ikki oman til húsar síns.

10 Og tá ið teir høvdu sagt Dávidi frá, sigandi, Ū-rī-ăh fór ikki oman at húsi sínum, segði Dávid við Ū-rī-ăh, Komst tú ikki frá ferð *tíni?* hví fórst tú *tá* ikki oman at húsi tínum?

11 Og Ū-rī-ăh segði við Dávid, Ørkin, og Ísrael, og Judah, eru verandi í tjøldum; og harri mín Jó-ăb, og tænarar harra míns, eru leiraðir í teimum opnu akrunum; skal eg tá fara inn í hús mítt, at eta og at drekka, og at liggja við konu míni? *sum* tú livirt, og *sum* sál tín livir, eg vil ikki gera henda lut.

12 Og Dávid segði við Ū-rī-ăh, Dvøl her í dag eisini, og í morgin

vil eg lata teg fara avstað. So Ū´-rī-āh varð í Jerusalem tann dagin, og morgindagin.

13 Og tá ið Dávid hevði kallað hann, át hann og drakk frammi fyri honum; og hann gjørdi hann druknan: og um aftan fór hann út at liggja á song síni við tænarum harra síns, men fór ikki oman til húsar síns.

14 ¶ Og tað bar á um morgunin, at Dávid skrivaði eitt bræv til Jó´-āb-s, og sendi *tað* við hendi Ū´-rī-āh.

15 Og hann skrivaði í brævinum, sigandi, Setið tit Ū´-rī-āh í tað fremsta av tí heitasta bardaganum, og takið tit *tykkum* aftur frá honum, at hann má verða sligin, og doyggja.

16 Og tað bar á, tá ið Jó´-āb eygleiddi staðin, at hann ávísti Ū´-rī-āh at einum plássi har hann vitsti, at reystir menn *vóru*.

17 Og menninir úr staðinum fóru út, og bardust við Jó´-āb: og tað fullu *summir* av fólkinum av tænarum Dávids; og Ū´-rī-āh Hittiti doyði eisini.

18 ¶ Tá sendi Jó´-āb og segði Dávidi allar lutirnar viðvíkjandi krígnum;

19 Og álegði sendiboðanum, sigandi, Tá ið tú hevurt lokið við at siga kongi frá málevnum krígsins,

20 Og um so verði, at kongsins vreiði reisist, og hann sigi við teg, Hvørsvegna nærkaðust tit so nær at staðinum tá ið tit bardust? vitstu tit ikki, at teir vildu skjóta frá múrinum?

21 Hvør sló Â-bī´-mê-lĕch Jĕrŭb´-bĕ-sjĕth-s son? kastaði ikki ein kvinna eitt stykki av einum kvarnarsteini uppá hann frá múrinum, at hann doyði í Thē´-bĕz? hví fóru tit nær múrinum? tá sigi tú, Tænari tín, Ū´-rī-āh Hittiti, er deyður eisini.

22 ¶ So sendiboðin fór, og kom og sýndi Dávidi alt sum Jó´-āb hevði sent hann fyri.

23 Og sendiboðin segði við Dávid, Vissuliga høvdu menninir yvirvág ímóti okkum, og komu út at okkum inn í akurin, og vit vóru uppiá teimum alt at innfaringini av portrinum.

24 Og skjúttarnir skutu oman av múrinum omanyvir tænarar tínar; og *summir* av tænarum kongs veri deyðir; og tín tænari, Ū´-rī-āh Hittiti, er deyður eisini.

25 Tá segði Dávid við sendiboðan, Svá skalt tú siga við Jó´-āb, Lat ikki hetta tingið mistokna tær, tí at svørðið uppslúkar ēin so væl sum ein annan: ger tín bardaga meiri sterkan ímóti staðinum, og kollrenn hann: og tilstuðla tú honum.

26 ¶ Og tá ið kona Ū´-rī-āh hoyrdi, at Ū´-rī-āh, maður hennara, var deyður, syrgdi hon yvir mann sín.

27 Og tá ið syrgjanin var umliðin, sendi Dávid og heintaði hana til húsar síns, og hon gjørdist kona hansara, og føddi honum ein son. Men tað tingið, sum Dávid hevði gjørt, mistoknaði HARRANUM.

KAPITUL 12

OG HARRIN sendi Náthan at Dávidi. Og hann kom at honum, og segði við hann, Tað vóru tveir menn í ēinum staði; tann ēini ríkur, og hīn fátækur.

2 Tann ríki *maðurin* hevði avbera mong smáfæafylgir og stórfæafylgir:

3 Men tann fátæki *maðurin* hevði einkið, uttan ēitt lítið gimburlamb, sum hann hevði keypt og nørt upp: og tað vaks upp saman við honum, og við børnum hansara; tað át av egna mati hansara, og drakk av egna bikari hansara, og lá í barmi hansara, og var honum sum ein dóttir.

4 Og tað kom ein ferðamaður at tí ríka manninum, og hann spardi at taka av sínum egna smáfæafylgi og av sínum egna stórfæafylgi, at tilreiða fyri tann vegfarandi mannin sum var komin at honum; men tók lambið hjá tí fátæka manninum, og tilreiddi tað fyri mannin sum var komin til hansara.

5 Og Dávids firtni varð stórliga kynd ímóti manninum; og hann segði til Náthans, *Sum* HARRIN livir, tann maður, sum hevur gjørt henda *lut,* skal vissuliga doyggja:

6 Og hann skal endurbøta lambið ferfalt, av tí at hann gjørdi henda lut, og av tí at hann hevði onga samkenslu.

7 ¶ Og Náthan segði til Dávids, Tú *ert* maðurin. Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Eg salvaði teg *til* kong yvir Ísrael, og eg útfríaði teg út úr hendi Sauls;

8 Og eg gav tær hús meistara tíns, og konur meistara tíns inn í favn tín, og gav tær hús Ísraels og Judah; og um *tað hevði verið* ov lítið, vildi eg harafturat havt givið tær slík og slík ting.

9 Hvørsvegna hevurt tú vanvirt boðið hjá HARRANUM, at gera ilt í eygsjón hans? tú hevurt dripið Ú´rī-āh Hittita við svørðinum, og hevurt tikið konu hansara *til at vera* kona tín, og hevurt vigið hann við svørði Ammons barna.

10 Nú, tessvegna skal svørðið aldri víkja frá húsi tínum; av tí at tú hevurt vanvirt meg, og hevurt tikið konu Ú´rī-āh Hittita til at vera kona tín.

11 Svá sigur HARRIN, Sí, eg vil reisa upp ilt ímóti tær út úr egna húsi tínum, og eg vil taka konur tínar frammi fyri eygum tínum, og geva *tær* at næsta tínum, og hann skal liggja við konum tínum í eygsjónini á hesi sól.

12 Tí at tú gjørdirt *tað* loyniliga: men eg vil gera henda lut frammi fyri øllum Ísrael, og frammi fyri sólini.

13 Og Dávid segði við Náthan, Eg havi syndað ímóti HARRANUM. Og Náthan segði við Dávid, HARRIN eisini hevur koyrt burtur synd tína; tú skalt ikki doyggja.

14 Hvussu enn er, av tí at við hesi gerð tú hevurt givið mikið tilevni til figgindanna av HARRANUM at Guðsspotta, barnið eisini, *sum verður* føtt at tær, skal vissuliga doyggja.

15 ¶ Og Náthan fór avstað at húsi sínum. Og HARRIN sló barnið, sum kona Ú´rī-āh føddi Dávidi, og tað var sera sjúkt.

16 Dávid tessvegna bønaði Guð fyri barnið; og Dávid fastaði, og fór inn, og lá alla nátt uppiá jørðini.

17 Og teir elstu av húsi hansara reistust, *og fóru* til hansara, at reisa hann upp frá jørðini: men hann vildi ikki, eiheldur át hann breyð við teimum.

18 Og tað hendi á tí sjeynda deginum, at barnið doyði. Og tænarar Dávids óttaðust at siga honum, at barnið var deytt: tí at teir søgdu, Sí, meðan barnið var enn á lívi, talaðu vit við hann, og hann vildi ikki lýða á rødd vára: hvussu vil hann tá níva seg, um vit siga honum, at barnið er deytt?

19 Men tá ið Dávid sá, at hansara tænarar teskaðu, varnaðist Dávid, at barnið var deytt: tí segði Dávid við tænarar sínar, Er barnið deytt? Og teir søgdu, Hann er deyður.

20 Tá reistist Dávid frá jørðini, og tváaði *sær,* og salvaði *seg,* og skifti klædnað sín, og kom inn í hús HARRANS, og tilbað: síðan kom hann til egna húss síns; og tá ið hann kravdi, settu tey breyð frammanfyri honum, og hann át.

21 Tá søgdu tænarar hansara við hann, Hvat ting *er* hetta, sum

tú hevurt gjørt? tú fastaðirt og grætst fyri barnið, *meðan tað var* á lívi; men tá ið barnið var deytt, reist tú *upp* og átst breyð.

22 Og hann segði, Meðan barnið var enn á lívi, fastaði eg og græt: tí at eg segði, Hvør kann siga, *hvørt* GUÐ vil vera náðisamur móti mær, at barnið má liva?

23 Men nú *ið* hann er deyður, hvørsvegna skuldi eg fastað? kann eg føra hann tilbakar aftur? eg skal fara til hansara, men hann skal ikki venda aftur til mín.

24 ¶ Og Dávid uggaði Bath-sjé-bú, konu sína, og fór inn at henni, og lá við henni: og hon føddi ein son, og hann kallaði navn hansara Sálomon: og HARRIN elskaði hann.

25 Og hann sendi við hendi Náthan prophets; og hann kallaði navn hansara Jéd-í-dí-ah, vegna HARRANS.

26 ¶ Og Jó-áb bardist ímóti Ráb-bah Ammons barna, og tók hin kongliga stað.

27 Og Jó-áb sendi sendiboðar til Dávids, og segði, Eg havi barst ímóti Ráb-bah, og havi tikið vatna-staðin.

28 Nú tessvegna, savna restina av fólkinum saman, og leirast ímóti staðinum, og tak hann: at ikki eg taki staðin, og hann verði kallaður eftir navni mínum.

29 Og Dávid savnaði alt fólkið saman, og fór til Ráb-bah, og bardist ímóti honum, og tók hann.

30 Og hann tók krúnu kongs teirra oman av høvdi hans, vektin hvará *var* ein talent av gulli við hinum virðismiklu steinunum: og hon varð *sett* á høvur Dávids. Og hann førdi fram herfong staðarins í miklum ríkiligleika.

31 Og hann førdi fram fólkið, sum *var* hará, og setti *tey* undir sagir, og undir harvur av jarni, og undir øksir av jarni, og fekk tey *at* fara ígjøgnum tigulsteins-ovnin: og soleiðis gjørdi hann at øllum staðum Ammons barna. So Dávid og alt fólkið vendu aftur at Jerusalem.

KAPITUL 13

OG tað bar á eftir hetta, at Áb-sá-lóm, sonur Dávids, hevði eina vakra systur, hvørs navn *var* Tá-már; og Amnon, sonur Dávids, elskaði hana.

2 Og Amnon var so nívdur, at hann fell sjúkur fyri systur sína Tá-már; tí at hon *var* ein jomfrú; og Amnon hugsaði tað torført hjá sær at gera nakað við hana.

3 Men Amnon hevði ein vin, hvørs navn *var* Jón-á-dáb, sonur Sjím-é-ah — bróður Dávids: og Jón-á-dáb *var* ein sera sniðfundigur maður.

4 Og hann segði við hann, Hví *ert* tú, *verandi* sonur kongs, soltin frá degi til dags? vilt tú ikki siga mær? Og Amnon segði við hann, Eg elski Tá-már, systur bróðurs míns Áb-sá-lóm-s.

5 Og Jón-á-dáb segði við hann, Legg teg niður á song tína, og ger teg sjúkan: og tá ið faðir tín kemur at síggja teg, sig við hann, Eg biði teg, lat systur mína Tá-már koma, og geva mær mat, og tilreiða matin í eygsjón míni, at eg má sjá *hann,* og eta *hann* av hennara hond.

6 ¶ So Amnon legðist niður, og gjørdi seg sjúkan: og tá ið kongur var komin at síggja hann, segði Amnon við kong, Eg biði teg, lat Tá-már, systur mína, koma, og gera mær eitt par av køkum í eygsjón míni, at eg má eta av hennara hond.

7 Tá sendi Dávid heim til Tá-már-ar, sigandi, Far nú til húsar Amnons, bróðurs tíns, og tilreið honum mat.

8 So Tá-már fór til húsar bróðurs síns Amnons; og hann

var lagstur niður. Og hon tók mjøl, og knoðaði *tað,* og gjørdi køkur í eygsjón hans, og bakaði køkurnar.

9 Og hon tók eina pannu, og helti *tær* út frammi fyri honum; men hann noktaði at eta. Og Amnon segði, Havið út allar menn frá mær. Og teir fóru út, hvør maður frá honum.

10 Og Amnon segði við Tá-mâr, Før matin inn í kamarið, at eg má eta av hond tíni. Og Tá-mâr tók køkurnar sum hon hevði gjørt, og førdi *tær* inn í kamarið til Amnons, bróðurs síns.

11 Og tá ið hon hevði ført *tær* at honum at eta, tók hann hald á henni, og segði við hana, Kom ligg við mær, systir mín.

12 Og hon svaraði honum, Nei, bróðir mín, noyð meg ikki; tí at einkið slíkt ting átti at verðið gjørt í Ísrael: ger ikki tú henda dárskap.

13 Og eg, hvagar skal eg elva skomm míni at fara? og hvat tær viðvíkur, tú skalt vera sum ein av dárunum í Ísrael. Nú tessvegna, eg biði teg, tala við kong; tí at hann vil ikki afturhalda meg frá tær.

14 Hvussu enn er, hann vildi ikki lýða á rødd hennara: men, verandi sterkari enn hon, noyddi hana, og lá við henni.

15 ¶ Tá hataði Amnon hana framúrliga; so at hatrið, hvarvið hann hataði hana, *var* størri enn kærleikin, hvarvið hann hevði elskað hana. Og Amnon segði við hana, Reis *teg,* ver farin.

16 Og hon segði við hann, *Tað er* eingin grund: hetta illa í at senda meg avstað, *er* størri enn hítt sum tú gjørdirt mær. Men hann vildi ikki lýða á hana.

17 Tá kallaði hann tænara sín, sum tænti at honum, og segði, Koyr nú hesa *kvinnu* út frá mær, og bolta hurðina eftir henni.

18 Og *hon hevði* eitt klæði av ymsum litum uppiá sær: tí at við slíkum skikkjum vóru kongsins døtur, *sum vóru* jomfrýr, skartaðar. Tá førdi hansara tænari hana út, og boltaði hurðina eftir henni.

19 ¶ Og Tá-mâr koyrdi øskur á høvur sítt, og skræddi sítt klæði av ymsum litum, sum *var* á henni, og legði sína hond á sítt høvur, og helt á at gráta.

20 Og Áb-sá-lǒm, bróðir hennara, segði við hana, Hevur Amnon, bróðir tín, verið við tær? men halt nú friði tínum, systir mín: hann *er* bróðir tín; gev ikki gætur eftir hesum luti. So Tá-mâr varð verandi ēinlig í húsi Áb-sá-lǒm-s, bróðurs síns.

21 ¶ Men tá ið Dávid kongur hoyrdi um allar hesar lutir, varð hann sera vreiður.

22 Og Áb-sá-lǒm talaði við bróðir sín Amnon hvørki gott ella ringt: tí at Áb-sá-lǒm hataði Amnon, av tí at hann hevði noytt systur sína Tá-mâr.

23 ¶ Og tað bar á eftir tvey full ár, at Absalom hevði seyðklipparar í Bá-ăl-hā-zôr, sum *er* við síðuna av Ē-phră-ĭm: og Áb-sá-lǒm beyð øllum kongssonunum.

24 Og Áb-sá-lǒm kom til kongs, og segði, Sí nú, tænari tín hevur seyðklipparar; lat kong, eg bøni teg, og hansara tænarar fara við tænara tínum.

25 Og kongur segði til Áb-sá-lǒm-s, Nei, sonur mín, latum okkum ikki allar nú fara, at ikki vit verði kravsamir at tær. Og hann trýsti hann: hvussu enn er, hann vildi ikki fara, men vælsignaði hann.

26 Tá segði Áb-sá-lǒm, Um ikki, eg biði teg, lat bróðir mín Amnon fara við okkum. Og kongur segði við hann, Hví skuldi hann farið við tær?

27 Men Ăb′-să-lŏm trýsti hann, at hann læt Amnon og allar kongssynirnar fara við honum.
28 ¶ Nú, Ăb′-să-lŏm hevði skipað tænarum sínum, sigandi, Merkið tit *tykkum* nú, nær hjarta Amnons er kátt við víni, og tá ið eg sigi við tykkum, Sláið Amnon; tá drepið hann, óttist ikki: havi ikki eg skipað tykkum? verið mótsamir, og verið reystir.
29 Og tænarar Ăb′-să-lŏm-s gjørdu at Amnoni eins og Ăb′-să-lŏm hevði skipað. Tá reistust allir kongssynirnir, og hvør maður slapp sær upp uppá múldjór sítt, og flýddi.
30 ¶ Og tað bar á, meðan teir vóru á veginum, at tíðindir komu til Dávids, sigandi, Ăb′-să-lŏm hevur vigið allar kongssynirnar, og tað er ikki ein av teimum eftir.
31 Tá reistist kongur, og skræddi klæðir síni, og lá á jørðini; og allir tænarar hansara stóðu hjá við klæðum sínum skrøddum.
32 Og Jón′-ă-dăb, sonur Sjĭm′-ĕ-ăh — bróður Dávids, svaraði og segði, Lat ikki harra mín halda, *at* teir hava vigið allar teir ungu menninar, synir kongsins; tí at Amnon einans er deyður: tí at eftir fyriskipan Ăb′-să-lŏm-s hevur hetta verið fyrisett frá tí degi ið hann noyddi systur hansara Tá′-mâr.
33 Nú tessvegna, lat ikki harra mín kong taka tingið til hjarta sítt, at hugsa, at allir kongssynirnir eru deyðir: tí at Amnon einans er deyður.
34 Men Ăb′-să-lŏm flýddi. Og tann ungi maðurin, sum helt varðhaldið, lyfti upp eygum sínum, og hugdi, og sí, tað kom nógv fólk eftir heyggjarsíðu-veginum aftanfyri hann.
35 Og Jón′-ă-dăb segði við kong, Sí, kongssynirnir koma: eins og tænari tín segði, soleiðis er tað.
36 Og tað bar á, so skjótt sum hann hevði lokið við at tala, at sí, kongssynirnir komu, og lyftu upp rødd síni og grótu: og kongur eisini og allir tænarar hansara grótu sera sáran.
37 ¶ Men Ăb′-să-lŏm flýddi, og fór til Tăl′-mâ-s, sonar Ăm′-mĭ-hŭd-s, kongs av Gē′-sjūr. Og *Dávid* syrgdi yvir son sín hvønn dag.
38 So Ăb′-să-lŏm flýddi, og fór til Gē′-sjūr, og var har trý ár.
39 Og *sálini hjá* Dávidi kongi longdist at fara út at Ăb′-să-lŏm-i: tí at hann var uggaður viðvíkjandi Amnoni, við tað at hann var deyður.

KAPITUL 14

NÚ, Jó′-ăb Zĕr-ŭ′-jŭh sonur varnaðist, at hjarta kongsins *var* mótvegis Ăb′-să-lŏm-i.
2 Og Jó′-ăb sendi til Tē-kō′-ăh, og heintaði haðani eina vísa kvinnu, og segði við hana, Eg biði teg, lætst at vera ein syrgjari, og far í nú syrgingarklædnað, og salva ikki teg sjálva við olju, men ver sum ein kvinna sum hevði eina langa tíð syrgt um hin deyða:
3 Og kom til kongsins, og tala eftir hesum háttarlagi við hann. So Jó′-ăb legði orðini í munn hennara.
4 ¶ Og tá ið kvinnan úr Tē′-kô-ăh talaði til kongsins, fell hon á andlit sítt til jarðarinnar, og inti heiðurslútan, og segði, Hjálp, O kongur.
5 Og kongur segði við hana, Hvat bagir tær? Og hon svaraði, Eg *eri* í roynd *og veru* ein einkjukvinna, og maður mín er deyður.
6 Og tín tænastumoyggj hevði tveir synir, og teir tveir klandraðust saman í akrinum, og *tað var* eingin at skilja teir, men tann ēini sló hīn, og vó hann.

7 Og sí, øll familjan er risin ímóti tænastumoyggj tíni, og tey søgdu, Flýggja hann sum sló bróður sín, at vit mega drepa hann, fyri lív bróðurs hansara, hvønn hann vó; og vit vilja oyða arvingan eisini: og soleiðis skulu tey sløkkja kol mítt, sum er eftir, og skulu ikki eftirlata til ektamans míns *hvørki* navn ella eftirveru uppiá jørðini.

8 Og kongur segði við kvinnuna, Far til húss tíns, og eg vil geva álegging viðvíkjandi tær.

9 Og kvinnan úr Tē´-kô-ăh segði við kong, Mín harri, O kongur, misgerðin *veri* á mær, og á faðirs míns húsi: og kongur og hásæti hans *veri* sakleys.

10 Og kongur segði, Hvørsumhelst *ið* sigur *okkurt* við teg, før hann til mín, og hann skal ikki nerta teg meira.

11 Tá segði hon, Eg biði teg, lat kong minnast HARRAN Guð tín, at tú vildirt ikki loyva hevnarunum av blóði at oyða meira, at ikki teir oyði son mín. Og hann segði, *Sum* HARRIN livir, tað skal ikki ēitt hár av syni tínum falla til jarðarinnar.

12 Tá segði kvinnan, Lat tænastumoy tína, eg biði teg, tala *ēitt* orð við harra mín kong. Og hann segði, Sig áfram.

13 Og kvinnan segði, Hvørsvegna hevurt tú tá hugsað eitt slíkt ting ímóti fólki Guðs? tí at kongur talar hetta tingið sum ēin ið er feilsamur, í at kongur heintar ikki heim aftur sín burturrikna.

14 Tí at vit noyðast at doyggja, og *eru* sum vatn stoytt á jørðina, sum kann ei verða savnað upp aftur; eiheldur metir Guð *nakran* persón: tó upphugsar hann midlar, at hansara burturrikni ei verði burturvístur frá honum.

15 Nú tessvegna, at eg eri komin at tala um hetta tingið við harra mín kong, *tað er* av tí at fólkið hevur gjørt meg rædda: og tín tænastumoy segði, Eg vil nú tala við kong; tað kann vera, at kongur vil útinna fyrispurning tænastumoyar sínar.

16 Tí at kongur vil hoyra, til at útfría sína tænastumoyggj út úr hondini á tí manni *sum vildi* oyða meg og son mín saman út úr arvi Guðs.

17 Tá segði tænastumoy tín, Orðið hjá harra mínum kongi skal nú vera ugganarsamt: tí sum ein eingil Guðs, soleiðis *er* harri mín kongur, til at greina gott og ringt: HARRIN tín Guð tí vil vera við tær.

18 Tá svaraði kongur og segði við kvinnuna, Fjal ikki fyri mær, eg biði teg, tað ting sum eg skal spyrja teg. Og kvinnan segði, Lat harra mín kong nú tala.

19 Og kongur segði, *Er ikki* hond Jó´-ăb-s við tær í øllum hesum? Og kvinnan svaraði og segði, *Sum* sál tín livir, harri mín kongur, eingin kann venda til hinnar høgru handar, ella til hinnar vinstru, frá onkrum sum harri mín kongur hevur talað: tí at tænari tín Jó´-ăb, hann beyð mær, og hann legði øll hesi orðini í munn tænastumoyar tínar:

20 *Fyri* at fáa til vegar henda form av talu hevur tænari tín Jó´-ăb gjørt henda lut: og mín harri *er* vísur, samsvarandi við vísdómin hjá einum eingli Guðs, at vita øll *ting* sum *eru* á jørðini.

21 ¶ Og kongur segði við Jó´-ăb, Sí nú, eg havi gjørt henda lut: far tí, før hin unga mannin, Ăb´-să-lŏm, aftur.

22 Og Jó´-ăb fell til jarðarinnar á andlit sítt, og boygdi seg, og takkaði kongi: og Jó´-ăb segði, Í dag veit tænari tín, at eg havi funnið náði í eygsjón tíni, harri mín, O kongur, í at kongur hevur uppfylt fyrispurning tænara síns.

23 So Jó´-ăb reistist og fór til Gē´-sjūr, og førdi Ăb´-să-lōm til Jerusalem.

24 Og kongur segði, Lat hann venda til egna hús sítt, og lat hann ikki síggja andlit mítt. So Ăb´-să-lōm vendi aftur til egna hús sítt, og sá ikki andlit kongsins.

25 ¶ Men í øllum Ísrael var tað eingin til at verða so mikið prísaður sum Ăb´-să-lōm fyri vakurleika sín: frá ilini á fóti hansara enntá til krúnu høvurs hansara var einkið lýti í honum.

26 Og tá ið hann stubbaði sær høvdið, (tí at tað var við endan á hvørjum ári, at hann stubbaði *tað:* av tí at *hárið* var tungt á honum, tí stubbaði hann tað:) vigaði hann hár høvurs síns á tvey hundrað sjē´-kl-ar eftir kongsins vekt.

27 Og Ăb´-să-lōm-i vórðu føddir tríggir synir, og ēin dóttir, hvørs navn *var* Tā´-mâr: hon var ein kvinna av eini vakrari ásjón.

28 ¶ So Ăb´-să-lōm dvaldist tvey *sam*full ár í Jerusalem, og sá ikki andlit kongsins.

29 Ăb´-să-lōm tessvegna sendi eftir Jó´-ăb-i, at fáa sent hann til kongs; men hann vildi ikki koma til hansara: og tá ið hann sendi aftur aðru ferðina, vildi hann ikki koma.

30 Tí segði hann við tænarar sínar, Síggið, Jó´-ăb-s akur er nær mínum, og hann hevur bygg har; farið og setið eld á hann. Og Ăb´-să-lōm-s tænarar settu eld á akurin.

31 Tá reistist Jó´-ăb, og kom til Ăb´-să-lōm-s at húsi *hansara,* og segði við hann, Hvørsvegna hava tænarar tínir sett eld á akur mín?

32 Og Ăb´-să-lōm svaraði Jó´-ăb-i, Sí, eg sendi at tær, sigandi, Kom higar, at eg má senda teg til kongsins, at siga, Hvørsvegna eri eg komin frá Gē´-sjūr? *tað hevði verið* gott hjá mær *at havt verið* har enn: nú tessvegna, lat meg síggja andlit kongsins; og um tað veri *nøkur* misgerð í mær, lat hann drepa meg.

33 So Jó´-ăb kom til kongsins, og taldi honum: og tá ið hann hevði kallað Ăb´-să-lōm, kom hann til kongsins, og boygdi seg á andlit sítt til jarðarinnar frammi fyri kongi: og kongur kysti Ăb´-să-lōm.

KAPITUL 15

OG tað bar á eftir hetta, at Ăb´-să-lōm tilbúði sær vagnar og hestar, og fimti menn at renna frammanfyri sær.

2 Og Ăb´-să-lōm reis upp árla, og stóð við síðuna av porturs-veginum: og tað varð *soleiðis,* at tá ið nakar maður, sum hevði eitt deilumál, kom til kongs til dóms, tá kallaði Ăb´-să-lōm at honum, og segði, Ur hvørjum staði *ert* tú? Og hann segði, tín tænari *er* úr ēinari av ættargreinum Ísraels.

3 Og Ăb´-să-lōm segði við hann, Síggj, tíni málevnir *eru* góð og rætt; men *tað er* eingin maður *fulltrúaður* av kongi at hoyra teg.

4 Ăb´-să-lōm segði harafturat, Á, at eg varð gjørdur *til* dómara í landinum, at hvør maður, sum hevur nakra rættarsøk, ella mál, mátti komið at mær, og eg vildi int honum rættlæti!

5 Og tað varð *soleiðis,* at tá ið nakar maður kom nær *til hansara* at inna honum heiðurslútan, setti hann fram hond sína, og hann tók hann, og kysti hann.

6 Og á henda hátt gjørdi Ăb´-să-lōm við alt Ísrael, sum kom til kongs til dóms: so Ăb´-să-lōm stjól hjørtu Ísraels manna.

7 ¶ Og tað bar á aftaná fjøruti ár, at Ăb´-să-lōm segði við kong, Eg biði teg, lat meg fara og rinda heiti mítt, sum eg havi strongt at HARRANUM, í Hē´-brōn.

8 Tí at tín tænari strongdi eitt heiti, meðan eg dvaldi í Gē´-sjūr í Sýriulandi, sigandi, Um HARRIN skal føra meg aftur í roynd *og veru* til Jerusalem, so vil eg tæna HARRANUM.

9 Og kongur segði við hann, Far í friði. So hann reistist, og fór til Hē´-brōn.

10 ¶ Men Ăb´-să-lōm sendi njósnarar út gjøgnum allar ættargreinir Ísraels, sigandi, So skjótt sum tit hoyra ljóðið av lúðrinum, tá skulu tit siga, Ăb´-să-lōm ríkir í Hē´-brōn.

11 Og við Ăb´-să-lōm-i fóru tvey hundrað menn út úr Jerusalem, *sum vóru* kallaðir; og teir fóru í einfaldni síni, og teir vitstu ikki nakað ting.

12 Og Ăb´-să-lōm sendi eftir Ă-hĭth´-ō-phĕl Gî-lô-nĭt´-a, ráðgeva Dávids, frá staði hans, *enntá* frá Gĭ´-lōh, meðan hann ofraði offur˘. Og samansvørjingin varð sterk; tí at fólkið øktist áframhaldandi við Ăb´-să-lōm-i.

13 ¶ Og tað kom ein sendiboði til Dávids, sigandi, Hjørtu Ísraels manna eru eftir Ăb´-să-lōm-i.

14 Og Dávid segði við allar tænarar sínar, sum *vóru* við honum í Jerusalem, Reisist, og latum okkum flýggja; tí at vit skulu ikki *annars* komast undan frá Ăb´-să-lōm-i: gerið skjótt *av* at fara avstað, at ikki hann innheinti okkum brádliga, og føri ilt omanyvir okkum, og slái staðin við svørðseggini.

15 Og kongsins tænarar søgdu við kong, Sí, tínir tænarar *eru tilreiðar at gera* hvatsumhelst *ið* harri mín kongur skal fyriskipa.

16 Og kongur fór fram, og alt hansara húshald eftir honum. Og kongur eftirlæt tíggju kvinnur, *sum vóru* medhústrýr, at passa húsið.

17 Og kongur fór fram, og alt fólkið eftir honum, og dvaldi á einum plássi sum var langt burturi.

18 Og allir hansara tænarar fóru áfram við síðuna av honum; og allir Chĕr-ē-thĭt´-arnir, og allir Pĕ-lē-thĭt´-arnir, og allir Gĭt-tĭt´-arnir, seks hundrað menn, sum komu aftaná honum frá Gáth, fóru áfram framfyri kong.

19 ¶ Tá segði kongur til Ĭt-tā´-ī-s Gĭt-tĭt´-a, Hvørsvegna fert tú eisini við okkum? far aftur til pláss títt, og verð hjá kongi: tí at tú *ert* ein fremmandur, og eisini ein útlegdar*maður*.

20 Hvar ið tú komst *bert* í gjár, skuldi eg henda dag fingið teg *at* farið niðan og oman við okkum? við tað *at* eg fari hvagar eg kann, far tú aftur, og tak aftur bróður tínar: miskunn og sannleiki *veri* við tær.

21 Og Ĭt-tā´-ī svaraði kongi, og segði, *Sum* HARRIN livir, og *sum* harri mín kongur livir, vissuliga, í hvørjum plássi *ið* harri mín kongur skal vera, hvørt í deyða, ella lívi, enntá har eisini vil tænari tín vera.

22 Og Dávid segði til Ĭt-tā´-ī-s, Gakk og far yvir. Og Ĭt-tā´-ī Gĭt-tĭt´-i fór yvir, og allir menn hansara, og øll hini smáu sum *vóru* við honum.

23 Og alt landið græt við harðari rødd, og alt fólkið fór yvirum: kongur eisini sjálvur fór yvirum áarløkin Kī´-drōn, og alt fólkið fór yvirum, ímóti vegi oyðunnar.

24 ¶ Og sí Zā´-dōk eisini, og allir Levitarnir *vóru* við honum, berandi ørk sáttmála Guðs: og teir settu niður ørk Guðs; og Ā´-bĭ-ă-thâr fór upp, inntil alt fólkið hevði lokið við at fara út úr staðinum.

25 Og kongur segði við Zā´-dōk, Ber aftur ørk Guðs inn í staðin: um eg skal finna góðtokka í eygum HARRANS, vil hann føra

meg aftur, og sýna mær *bæði* hana, og bústað sín:

26 Men um hann svá sigi, Eg havi onga fragd í tær; sí, *her eri* eg, lat hann gera við meg eins og honum tykir gott.

27 Kongur segði eisini við Zā´dŏk prest, *Ert ikki* tú ein síggjari? far aftur inn í staðin í friði, og tykkara tveir synir við tykkum, Ă-hĭ´-mă-ăz, sonur tín; og Jónathan, sonur Ā´-bĭ-ă-thâr-s.

28 Sí, eg vil stegða á slætta oyðunnar, inntil tað komi orð frá tykkum til at vissa meg.

29 Zā´-dŏk tessvegna og Ā´-bĭ-ă-thâr bóru ørk Guðs aftur til Jerusalem: og teir dvøldu har.

30 ¶ Og Dávid fór niðan eftir uppstíging Olivin*fjallsins,* og græt sum hann fór niðan, og hevði høvur sítt dekkað, og hann fór berføttur: og alt fólkið, sum *var* við honum, dekkaðu hvør maður høvur sítt; og teir fóru niðan, grátandi sum teir fóru niðan.

31 ¶ Og *ēin* segði Dávidi frá, sigandi, Ă-hĭth´-ō-phĕl *er* millum samansvørjararnar við Ăb´-să-lŏm-i. Og Dávid segði, O HARRI, eg biði teg, vend tilráðing Ă-hĭth´-ō-phĕl-s yvirí dárskap.

32 ¶ Og tað bar á, at *tá ið* Dávid var komin til toppin *á fjallinum,* har hann tilbað Guð, sí, Hū´-sjāî Âr-chĭt´-i kom at møta honum við kyrtli sínum skrøddum, og mold uppiá høvdi sínum:

33 Við hvønn Dávid segði, Um tú fert áfram við mær, tá skalt tú verða ein byrði at mær:

34 Men um tú vendi aftur til staðarins, og sigi við Ăb´-să-lŏm, Eg vil vera tænari tín, O kongur; *eins og* eg *havi verið* tænari faðirs tíns higartil, soleiðis *vil* eg nú eisini *vera* tænari tín: tá kanst tú fyri meg vinna á tilráðing Ă-hĭth´-ō-phĕl-s.

35 Og *hevurt tú* ikki har við tær Zā´-dŏk og Ā´-bĭ-ă-thâr, prestarnar? tí skal tað verða, *at* hvat ting sumhelst *ið* tú skalt hoyra út úr kongshúsinum, tú skalt siga *tað* fyri Zā´-dŏk-i og Ā´-bĭ-ă-thâr-i, prestunum.

36 Sí, *teir hava* har við sær synir sínar tveir, Ă-hĭ´-mă-ăz Zā´-dŏk-s *son,* og Jónathan Ā´-bĭ-ă-thâr-s *son;* og við teimum skulu tit senda at mær hvørt ting sum tit kunnu hoyra.

37 So Hū´-sjāî, vinur Dávids, kom inn í staðin, og Ăb´-să-lŏm kom inn í Jerusalem.

KAPITUL 16

OG tá ið Dávid var eitt sindur framvið toppinum *av heygnum,* sí, Zĭ´-bă, tænari Mĕ-phĭ´-bŏ-sjĕth-s, møtti honum, við einum pari av asnum saðlaðum, og uppiá teimum tvey hundrað *heilbreyð,* og eitt hundrað tyssir av rosinum, og eitt hundrað av summar fruktum, og ein kíkur av víni.

2 Og kongur segði við Zĭ´-bă, Hvat meinart tú við hesum? Og Zĭ´-bă segði, Asnarnir *veri* til húski kongs at ríða á; og breyðið og summar fruktir*nar* til teir ungu menninar at eta; og vínið, at slíkir, sum verði ørmaktaðir í oyðuni, mega drekka.

3 Og kongur segði, Og hvar *er* sonur meistara tíns? Og Zĭ´-bă segði við kong, Sí, hann dvølur í Jerusalem: tí hann segði, Í dag skal hús Ísraels endurbøta mær kongadømi faðirs míns.

4 Tá segði kongur til Zĭ´-bă, Sí, tínir *eru* allir sum *tilhoyrdu* Mĕ-phĭ´-bŏ-sjĕth-i. Og Zĭ´-bă segði, Eg eyðmjúkiliga bøni teg, *at* eg má finna náði í eygsjón tíni, harri mín, O kongur.

5 ¶ Og tá ið kong Dávid kom til Bă-hū´-rĭm, sí, haðani kom út ein maður av familju hús-

ar Sauls, hvørs navn *var* Sjĭm´-ĕ-ī, sonur Gē´-rā: hann kom fram, og bannaði støðugt sum hann kom.

6 Og hann kastaði steinar eftir Dávidi, og eftir øllum tænarum Dávids kongs: og alt fólkið og allir teir mektigu menninir *vóru* við hansara høgru hond og við hansara vinstru.

7 Og svá segði Sjĭm´-ĕ-ī, tá ið hann bannaði, Kom út, kom út, tú blóðigi maður, og tú Bē´-lĭ-ăl-s maður:

8 HARRIN hevur endursent omanyvir teg alt blóðið av húsi Sauls, í hvørs stað tú hevurt ríkt; og HARRIN hevur flýggjað kongadømið inn í hond Ăb´-să-lŏm-s, sonar tíns: og sí, tú *ert tikin* í tíni ógerð, av tí at tú *ert* ein blóðigur maður.

9 ¶ Tá segði Á´-bĭ-sjâi Zĕr-ū´-jŭh sonur við kong, Hví skuldi hesin deyði hundur bannað harra mín kongin? lat meg fara yvir, eg biði teg, og taka av høvur hansara.

10 Og kongur segði, Hvat havi eg at gera við tykkum, tit Zĕr-ū´-jŭh synir? so lat hann banna, av tí at HARRIN hevur sagt við hann, Banna Dávid. Hvør skal tá siga, Hvørsvegna hevurt tú gjørt so?

11 Og Dávid segði til Á´-bĭ-sjâi-s, og til alra tænara sína, Sí, sonur mín, sum kom fram úr innangoymslum mínum, søkir lív mítt: hvør mikið meira nú *má hesin* Benjamitin *gera tað?* latið hann vera, og latið hann banna; tí at HARRIN hevur boðið honum.

12 Tað kann vera, at HARRIN vilji hyggja á mína nívd, og at HARRIN vilji viðurgjalda mær gott fyri hansara bannan henda dag.

13 Og sum Dávid og hansara menn fóru eftir veginum, fór Sjĭm´-ĕ-ī yvireftir á heyggjarsíðuni yvir av honum, og bannaði sum hann fór, og blakaði steinar eftir honum, og kastaði støv.

14 Og kongur, og alt fólkið sum við honum *var,* komu útlúgvaðir, og endurfrískaðu seg har.

15 ¶ Og Ăb´-să-lŏm, og alt fólkið — menninir av Ísrael, komu til Jerusalem, og Ă-hĭth´-ō-phĕl við honum.

16 Og tað bar á, tá ið Hū´-sjâi Âr-chĭt´-i, vinur Dávids, var komin at Ăb´-să-lŏm-i, at Hū´-sjâi segði við Ăb´-să-lŏm, Guð varði kongin, Guð varði kongin.

17 Og Ăb´-să-lŏm segði til Hū´-sjâi-s, *Er* hetta tín blídni móti vini tínum? hví fórt tú ikki við vini tínum?

18 Og Hū´-sjâi segði við Ăb´-să-lŏm, Nei; men hvønn HARRIN, og hetta fólk, og allir menninir av Ísrael, velja, hansara vil eg vera, og hjá honum vil eg verða.

19 Og *upp*aftur, hvørjum skuldi eg tænt? *skuldi eg* ikki *tænt* í nærveru sonar hans? eins og eg havi tænt í nærveru faðirs tíns, soleiðis vil eg vera í nærveru tíni.

20 ¶ Tá segði Ăb´-să-lŏm til Ă-hĭth´-ō-phĕl-s, Gevið tilráðing tykkara millum, hvat vit skulu gera.

21 Og Ă-hĭth´-ō-phĕl segði við Ăb´-să-lŏm, Far inn at medkonum faðirs tíns, sum hann hevur eftirlatið at passa húsið; og alt Ísrael skal hoyra, at tær verður staðist við av faðir tínum: tá skulu hendurnar á øllum, sum *eru* við tær, vera sterkar.

22 So teir breiddu Ăb´-să-lŏm-i eitt tjald uppiá toppinum av húsinum; og Ăb´-să-lŏm fór inn at medkonum faðirs síns í eygsjón als Ísraels.

23 Og tilráðing Ă-hĭth´-ō-phĕl-s, sum hann tilráddi í teimum døgum, *var* sum um maður hevði fregnað hjá orakli Guðs: soleiðis *var* øll tilráðing Ă-hĭth´-ō-phĕl-s, bæði hjá Dávidi og hjá Ăb´-să-lŏm-i.

KAPITUL 17

HARAFTURAT segði Ä-hïth´-ö-phël við Absalom, Lat meg nú velja út tólv túsund menn, og eg vil reisast og elta eftir Dávidi hesa nátt:

2 Og eg vil koma uppá hann, meðan hann *er* útlúgvaður og veikhentur, og vil gera hann ræddan:
og alt fólkið, sum við honum *eru,*
skulu flýggja; og eg vil sláa kongin
einans:

3 Og eg vil føra aftur alt fólkið
at tær: maðurin, hvønn tú søkirt,
er sum um allir komu aftur: *so*
skal alt fólkið vera í friði.

4 Og framsøgnin hóvaði Äb´-sä-lŏm-i væl, og øllum teimum elstu
av Ísrael.

5 Tá segði Äb´-sä-lŏm, Kalla nú
Hū´-sjâi Ar-chït´-a eisini, og latum
okkum hoyra somuleiðis hvat
hann sigur.

6 Og tá ið Hū´-sjâi var komin til
Äb´-sä-lŏm-s, talaði Äb´-sä-lŏm við
hann, sigandi, Ä-hïth´-ö-phël hevur talað eftir hesum háttarlagi:
skulu vit gera *eftir* framsøgn hansara? um ikki; tala tú.

7 Og Hū´-sjâi segði við Äb´-sä-lŏm, Tilráðingin, sum Ä-hïth´-ö-phël hevur givið, *er* ikki góð á hesum sinni.

8 Tí, segði Hū´-sjâi, tú kennirt
faðir tín og menn hansara, at teir
veri mektigir menn, og teir *veri*
ertir í sinnum sínum, eins og ein
bjørn, rænd fyri hvølpar sínar, í
akrinum: og faðir tín *er* ein krígsmaður, og vil ikki halda til við
fólkinum.

9 Sí, hann er fjaldur nú í
onkrari holu, ella í onkrum *øðrum* plássi: og tað vil bera á, tá ið
summir av teimum veri kollrendir í fyrstani, at hvørsumhelst *ið*
hoyrir tað vil siga, Tað er ein slátran millum fólksins ið fylgja Äb´-sä-lŏm-i.

10 Og hann eisini *sum er* reystur, hvørs hjarta *er* eins og hjartað
á eini leyvu, skal aldeilis bráðna:
tí at alt Ísrael veit, at faðir tín *er*
ein mektigur maður, og *teir,* ið
veri við honum, *eru* reystir menn.

11 Tí tilráði eg, at allur Ísrael
veri sum heild savnaður at tær,
frá Dán enntá til Bēēr´-sjĕ-bŭ,
sum sandurin sum *er* við sjógvin
í fjøldleika; og at tú fari til orrustu
í tínum egna persóni.

12 So skulu vit koma uppá
hann í onkrum plássi har hann
skal verða funnin, og vit vilja
lenda uppiá honum sum døggin
fellur á lendið: og av honum og
av øllum monnunum, sum *eru*
við honum, skal tað ei verða eftir
so mikið sum ēin.

13 Harafturat, um hann verði
fingin inn í ein stað, tá skal allur
Ísrael koma við reipum til tann
staðin, og vit vilja draga hann inn
í ánna, inntil tað ei verði ēin lítil
steinur funnin har.

14 Og Äb´-sä-lŏm og allir menninir av Ísrael søgdu, Tilráðing Hū´-sjâi-s Ar-chït´-a *er* betri enn tilráðing Ä-hïth´-ö-phël-s. Tí at HARRIN hevði fyriskipað at yvirvinna góðu tilráðing Ä-hïth´-ö-phël-s, til teirrar ætlanar, at HARRIN mátti føra ilt omanyvir Äb´-sä-lŏm.

15 ¶ Tá segði Hū´-sjâi við Zā´-dŏk og til Ä´-bï-ä-thär-s, prestanna, Soleiðis og soleiðis tilráddi Ä-hïth´-ö-phël Äb´-sä-lŏm-i og hinum elstu av Ísrael; og soleiðis og soleiðis havi eg tilrátt.

16 Nú tessvegna, send snarliga, og sig Dávidi, sigandi, Halt
ikki til hesa nátt í slættunum av
oyðuni, men fljótliga far yvir; at
ikki kongur verði svølgdur upp,
og alt fólkið sum við honum *eru.*

17 Nú, Jónathan og Ä-hï´-mäz steðgaðu við Ēn-rō´-gĕl; tí at
teir máttu ei verða sæddir at
koma inn í staðin: og eitt fljóð
fór og segði teimum; og teir fóru
og søgdu Dávidi kongi frá.

18 Hóast hetta, ein slúrur sá
teir, og taldi Ăb′-să-lŏm-i: men
teir fóru báðir av teimum avstað
snarliga, og komu til húsar mans
í Bă-hū′-rīm, sum hevði ein brunn
í forgarði sínum; hvagar teir fóru
niður.

19 Og kvinnan tók og breiddi
eina huld yvir munnan á brunn-
inum, og breiddi malið korn har-
á; og tingið varð ikki kunnugt.

20 Og tá ið tænarar Ăb′-să-lŏm-s
komu til kvinnunnar til hússins,
søgdu teir, Hvar *er* Ă-hī′-mă-ăz og
Jónathan? Og kvinnan segði við
teir, Teir veri farnir yvirum vatns-
løkin. Og tá ið teir høvdu leitað
og kundu ikki finna *teir,* vendu
teir aftur til Jerusalem.

21 Og tað bar á, eftir *at* teir
vóru farnir avstað, at teir komu
upp út úr brunninum, og fóru og
taldu Dávidi kongi, og søgdu við
Dávid, Reis teg, og far fljótliga
yvirum vatnið: tí at svá hevur Ă-
hĭth′-ŏ-phĕl tilrátt ímóti tykkum.

22 Tá reistist Dávid, og alt fólk-
ið sum við honum *vóru,* og teir
fóru yvirum Jordan: við morgun
ljósið vantaði ikki ein av teimum
sum var ikki farin yvirum Jordan.

23 ¶ Og tá ið Ă-hĭth′-ŏ-phĕl
sá, at hansara tilráðing varð ikki
fylgd, saðlaði hann asna *sín,* og
reistist, og slapp sær heim til húss
síns, til staðar síns, og setti sítt
húshald í rættlag, og hongdi seg,
og doyði, og varð jarðaður í grav-
hýsi faðirs síns.

24 Tá kom Dávid til Mă-há′-
nă-ĭm. Og Ăb′-să-lŏm fór yvirum
Jordan, hann og allir menninir av
Ísrael við honum.

25 ¶ Og Ăb′-să-lŏm gjørdi Á′-
mâ-să *til* høvuðsmann av herlið-
inum ístaðin fyri Jó′-ăb: hvør
Á′-mâ-să *var* sonurin at einum
manni, hvørs navn *var* Ĭth′-ră, ein
Ísraeliti, sum fór inn til Ă′-bĭ-gâĭl-
ar Náhasj dóttur, systur til Zĕr-ū′-
jŭh — móður Jó′-ăb-s.

26 So Ísrael og Ăb′-să-lŏm slógu
upp í landi Gileads.

27 ¶ Og tað bar á, tá ið Dávid
var komin til Mă-há′-nă-ĭm, at
Sjō′-bī Náhasj sonur úr Răb′-băh
Ammons barna, og Má′-chĭr Ăm′-
mĭ-ĕl-s sonur úr Lō′-dĕ-bâr, og
Bâr-zĭl-lă′-ī Gileaditi úr Rō′-gĕ-
lĭm,

28 Komu við sengrum, og
kørum, og leirkerum, og hveiti,
og byggi, og mjøli, og svidnum
korni, og bønum, og flatbønum,
og turkaðum *bjølg-plantum,*

29 Og hunangi, og smøri, og
seyði, og kúgvaosti, til Dávids,
og til fólksins ið við honum *vóru,*
at eta: tí at teir søgdu, Fólkið
er svangt, og lúgvað, og tyrst, í
oyðuni.

KAPITUL 18

OG Dávid upptaldi fólkið,
sum við honum *vóru,* og
setti høvuðsmenn hjá túsundum
og høvuðsmenn hjá hundraðum
yvir teimum.

2 Og Dávid sendi fram ein
triðjing av fólkinum undir hendi
Jó′-ăb-s, og ein triðjing undir hendi
Á′-bĭ-sjâĭ-s Zĕr-ū′-jŭh sonar, bróð-
ur Jó′-ăb-s, og ein triðjing undir
hendi Ĭt-tā′-ĭ-s Gĭt-tĭt′-a. Og kong-
ur segði við fólkið, Eg vil vissu-
liga fara fram við tykkum sjálvur
eisini.

3 Men fólkið svaraði, Tú skalt
ikki fara fram: tí at um vit flýggi
avstað, vilja teir ikki leggja í okk-
um; eiheldur um helmingurin av
okkum doyggi, vilja teir leggja í
okkum: men nú *ert tú* verdur tí-
ggju túsund av okkum: tessvegna
nú *er tað* betri, at tú dugni okkum
úr staðinum.

4 Og kongur segði við teir,
Hvat tykkum tykir best, vil eg
gera. Og kongur stóð við portur-
síðuna, og alt fólkið kom út
eftir hundraðum og eftir túsund-
um.

5 Og kongur ábjóðaði Jó´-ăb-i og Á-bī-sjâi-i og Ĭt-tā´-ī-i, sigandi, *Farið* blídligani fyri mína skuld við tí unga manninum, *enntá* við Ăb´-să-lŏm-i. Og alt fólkið hoyrdi, tá ið kongur gav øllum høvuðsmonnunum álegging viðvíkjandi Ăb´-să-lŏm-i.

6 ¶ So fólkið fór út í akurin ímóti Ísrael: og bardagin var í skógi Ē´-phrā-ĭm-s;

7 Har fólk Ísraels vórðu vignir frammi fyri tænarum Dávids, og tað var har ein mikil slátran tann dagin av tjúgu túsund *monnum*.

8 Tí at bardagin var har spjaddur yvir ásjónina á øllum landinum: og skógurin uppgloypti fleiri fólk tann dagin enn svørðið uppgloypti.

9 ¶ Og Ăb´-să-lŏm møtti tænarum Dávids. Og Ăb´-să-lŏm reið uppiá einum múldjóri, og múldjórið fór undir teir tjúkku bummarnar av eini miklari eik, og hans høvur tók hald á eikini, og hann varð tikin upp ímillum himinin og jørðina; og múldjórið, sum *var* undir honum, fór avstað.

10 Og ein ávísur maður sá *tað*, og taldi Jó´-ăb-i, og segði, Sí, eg sá Ăb´-să-lŏm hongdan í eini eik.

11 Og Jó´-ăb segði við mannin sum taldi honum, Og sí, tú sást *hann*, og hví slóst tú hann ikki har til jarðarinnar? og eg vildi havt givið tær tíggju *sjē´-kl-ar* av silvuri, og ein gyrðil.

12 Og maðurin segði við Jó´-ăb, Tó *at* eg skuldi móttikið túsund *sjē´-kl-ar* av silvuri í hond mína, *tó* vildi eg ikki sett fram mína hond ímóti kongssyninum: tí at í vári áhoyrn álegði kongur tær og Á-bī-sjâi-i og Ĭt-tā´-ī-i, sigandi, Verið varnir, at eingin *nerti* tann unga mannin Ăb´-să-lŏm.

13 Annars hevði eg havt virkað fals ímóti mínum egna lívi: tí at tað er einkið málevni fjalt fyri kongi, og tú sjálvur vildirt havt sett teg sjálvan ímóti *mær*.

14 Tá segði Jó´-ăb, Eg má ikki drála soleiðis hjá tær. Og hann tók tríggjar pílar í hond sína, og stoytti teir ígjøgnum hjarta Ăb´-să-lŏm-s, meðan hann *var* enn á lívi í miðjari eikini.

15 Og tíggju ungir menn, sum bóru herbúnað Jó´-ăb-s, umringaðu umkring og slógu Ăb´-să-lŏm, og vógu hann.

16 Og Jó´-ăb blásti lúðurin, og fólkið vendi aftur frá at elta eftir Ísrael: tí at Jó´-ăb helt fólkinum aftur.

17 Og teir tóku Ăb´-să-lŏm, og kastaðu hann inn í eina mikla holu í skóginum, og løgdu eina sera mikla rúgvu av steinum omanyvir hann: og allur Ísrael flýddi hvør *og* ēin til tjalds síns.

18 ¶ Nú, Ăb´-să-lŏm í síni lívstíð hevði tikið og reist upp til sín sjálvs eina súlu, sum *er* í kongsdalinum: tí hann segði, Eg havi ongan son at halda navn mítt í endurminning: og hann kallaði súluna eftir egna navni sínum: og hon verður kallað at hesum degi, Ăb´-să-lŏm-s pláss.

19 ¶ Tá segði Ă-hĭ´-mă-ăz Zā´-dŏk-s sonur, Lat meg nú renna, og bera kongi tíðindir, hvussu ið HARRIN hevur hevnt hann á fíggindar hans.

20 Og Jó´-ăb segði við hann, Tú skalt ikki bera tíðindir henda dag, men tú skalt bera tíðindir ein annan dag: men henda dag skalt tú eingi tíðindir bera, av tí at sonur kongsins er deyður.

21 Tá segði Jó´-ăb til Cū´-sjī-s, Far sig kongi hvat tú hevurt sæð. Og Cū´-sjī boygdi seg at Jó´-ăb-i, og rann.

22 Tá segði Ă-hĭ´-mă-ăz Zā´-dŏk-s sonur uppaftur til Jó´-ăb-s, Men hvussu enn er, lat meg, eg biði teg, eisini renna aftaná Cū´-sjī. Og Jó´-ăb segði, Hvørsvegna

vilt tú renna, sonur mín, eftirsum *at* tú eingi tíðindir hevurt tilreiðar?

23 Men hvussu enn er, *segði hann,* lat meg renna. Og hann segði við hann, Renn. Tá rann Ă-hī′-mă-ăz eftir vegi slættarins, og rann framum Cū′-sjī.

24 Og Dávid sat ímillum tey tvey portrini: og varðmaðurin fór upp til takið yvir portrinum at múrinum, og lyfti upp eygum sínum, og hugdi, og sí, ein maður rennandi einsamallur.

25 Og varðmaðurin geylaði, og segði kongi frá. Og kongur segði, Um hann *veri seg* einsamallur, *eru* tíðindir í munni hansara. Og hann kom í hurti, og nærkaðist.

26 Og varðmaðurin sá ein annan mann rennandi: og varðmaðurin kallaði at duravørðinum, og segði, Sí *ein annar* maður rennandi einsamallur. Og kongur segði, Hann eisini ber tíðindir.

27 Og varðmaðurin segði, Mær tykir renningarlagið hjá tí fremra vera líka *sum* renningarlagið hjá Ă-hī′-mă-ăz-i Zā′-dŏk-s syni. Og kongur segði, Hann *er* ein góður maður, og kemur við góðum tíðindum.

28 Og Ă-hī′-mă-ăz kallaði, og segði við kong, Alt er væl *statt*. Og hann fell niður til jarðarinnar uppá sítt andlit frammi fyri kongi, og segði, Vælsignaður *veri* HARRIN Guð tín, sum hevur flýggjað upp menninar, sum lyftu upp hond sína ímóti harra mínum kongi.

29 Og kongur segði, *Er* tann ungi maðurin Ăb′-să-lŏm tryggur? Og Ă-hī′-mă-ăz svaraði, Tá ið Jó′-ăb sendi tænara kongs, og *meg* tænara tín, sá eg ein miklan háva, men eg vitsti ikki hvat *tað var*.

30 Og kongur segði *við hann,* Vent til viks, *og* statt her. Og hann vendi til viks, og stóð stillur.

31 Og sí, Cū′-sjī kom; og Cū′-sjī segði, Tíðindir, harri mín kongur: tí at HARRIN hevur hevnt teg henda dag á allar teir sum risu upp ímóti tær.

32 Og kongur segði við Cū′-sjī, *Er* tann ungi maðurin Ăb′-să-lŏm tryggur? Og Cū′-sjī svaraði, Fíggindarnir hjá harra mínum kongi, og allir sum rísa ímóti tær at gera *tær* mein, veri sum *hasin* ungi maðurin *er*.

33 ¶ Og kongurin varð mikið rørdur, og fór upp til kamarið yvir portrinum, og græt: og sum hann fór, soleiðis segði hann, O sonur mín Ăb′-să-lŏm, sonur mín, sonur mín Ăb′-să-lŏm! gævi Guð, eg hevði doyð fyri teg, O Ăb′-să-lŏm, sonur mín, sonur mín!

KAPITUL 19

OG tað varð sagt Jó′-ăb-i, Sí, kongur grætur og harmast um Ăb′-să-lŏm.

2 Og sigurin tann dagin varð *vendur* í harman hjá øllum fólkinum: tí at fólkið hoyrdi graml tann dagin, hvussu kongur var harmur um son sín.

3 Og fólkið slapp sær við stjalan tann dagin inn í staðin, eins og fólk sum skammast stjelist burtur, tá ið teir flýggja í bardaga.

4 Men kongur dekkaði sítt andlit, og kongur rópti við harðari rødd, O sonur mín Ăb′-să-lŏm, O Ăb′-să-lŏm, sonur mín, sonur mín!

5 Og Jó′-ăb kom inn í húsið til kongsins, og segði, Tú hevurt skammfuktað henda dag andlitini á øllum tænarum tínum, sum henda dag hava bjargað lívi tínum, og lívunum hjá sonum tínum og hjá døtrum tínum, og lívunum hjá ektakonum tínum, og lívunum hjá medkonum tínum;

6 Í at tú elskart tínar figgindar, og hatart vinir tínar. Tí at tú hevurt kunngjørt henda dag, at

tú gevurt far um hvørki prinsar ella tænarar: tí henda dag varnist eg, at um Äb´-să-lŏm hevði livað, og allir vit høvdu doyð henda dag, tá hevði tað líkað tær væl.

7 Nú tessvegna, reis *teg*, far fram, og tala ugganarsamligani við tínar tænarar: tí eg svørji við HARRAN, um tú ei fari fram, vil tað ikki dvølja ēin hjá tær hesa nátt: og tað vil vera verri at tær enn alt tað illa sum viðurfór tær frá ungdómi tínum inntil nú.

8 Tá reistist kongur, og settist í portrinum. Og teir søgdu frá yvirfyri øllum fólkinum, sigandi, Sí, kongurin situr í portrinum. Og alt fólkið kom framfyri kong: tí at Ísrael hevði flýtt, hvør maður til tjalds síns.

9 ¶ Og alt fólkið var í trætnaði út gjøgnum allar ættargreinir Ísraels, sigandi, Kongur bjargaði okkum út úr hondini á figgindum várum, og hann útfríaði okkum út úr hondini á Philistunum; og nú er hann flýddur úr landinum yvir Äb´-să-lŏm.

10 Og Äb´-să-lŏm, sum vit salvaðu yvir okkum, er deyður í orrustu. Nú tessvegna, hví tala tit ikki eitt orð um at føra kong aftur?

11 ¶ Og Dávid kongur sendi til Zā´-dŏk-s og til Ā´-bĭ-ă-thâr-s, prestanna, sigandi, Talið við hinar elstu av Judah, sigandi, Hví eru tit hinir síðstu at føra kong aftur til húsar hans? eftirsum *at* talan hjá øllum Ísrael er komin til kongs, *enntá* til húsar hans.

12 Tit *eru* brøður mínir, tit *eru* bein míni og kjøt mítt: hvørsvegna eru tit tá hinir síðstu at føra aftur kong?

13 Og sigið tit til Á´-mâ-să, *Ert* tú ikki av beini mínum, og av kjøti mínum? Guð geri soleiðis við meg, og meira við, um tú veri ikki høvuðsmaður av herliðinum frammi fyri mær áframhaldandi í rúmi Jó´-ăb-s.

14 Og hann boygdi hjartað hjá øllum monnunum av Judah, enntá sum *hjartað hjá* ēinum manni; so at teir sendu *hetta orðið* at kongi, Komi tú aftur, og allir tænarar tínir.

15 So kongur kom aftur, og kom til Jordan. Og Judah kom til Gĭl´-găl, at fara at hitta kong, at flyta kong yvirum Jordan.

16 ¶ Og Sjĭm´-ē-ī Gē´-ră sonur, ein Benjamiti, sum *var* av Bă-hū´-rĭm, skundaði *sær* og kom oman við monnunum av Judah at hitta Dávid kong.

17 Og *tað vóru* túsund menn av Benjamin við honum, og Zĭ´-bă, tænari húsar Sauls, og hansara fimtan synir og hansara tjúgu tænarar við honum; og teir fóru yvirum Jordan frammanfyri kongi.

18 Og tað fór yvirum ein ferju-bátur at bera yvirum húski kongs, og at gera hvat *ið* hann helt gott. Og Sjĭm´-ē-ī Gē´-ră sonur fell niður frammi fyri kongi, sum hann var komin yvirum Jordan;

19 Og segði við kong, Lat ikki harra mín tilrokna mær misgerð, eiheldur minnist tú til tess, sum tænari tín gjørdi spilluliga tann dagin ið harri mín kongur fór út úr Jerusalem, at kongur skuldi tikið tað til hjarta síns.

20 Tí at tænari tín veit, at eg havi syndað: tessvegna, sí, eg eri komin hin fyrsti henda dag av øllum húsi Jósephs at fara oman at hitta harra mín kong.

21 Men Á´-bĭ-sjâi Zĕr-ū´-jŭh sonur svaraði og segði, Skal ikki Sjĭm´-ē-ī verða tikin av lívi fyri hetta, av tí at hann bannaði HARRANS salvaða?

22 Og Dávid segði, Hvat havi eg at gera við tykkum, tit Zĕr-ū´-jŭh synir, at tit skuldu henda dag vera mótstandarar at mær? skal tað nakar maður verða tikin av

lívi henda dag í Ísrael? tí at veit ikki eg, at eg *eri* henda dag kongur yvir Ísrael?

23 Tí segði kongur við Sjïm´ĕ-ī, Tú skalt ikki doyggja. Og kongur svór at honum.

24 ¶ Og Mĕ-phī´-bō-sjĕth, sonur Sauls, kom oman at hitta kong, og hevði hvørki hampað føtur sínar, ella snøggað skegg sítt, ella tvigið klæðir síni, frá tí degi *ið* kongur fór avstað, inntil tann dag *ið* hann kom *aftur* í friði.

25 Og tað bar á, tá ið hann var komin til Jerusalem at hitta kong, at kongur segði við hann, Hvørsvegna fórt ikki tú við mær, Mĕ-phī´-bō-sjĕth?

26 Og hann svaraði, Mín harri, O kongur, tænari mín snýtti meg: tí at tænari tín segði, Eg vil saðla mær ein asna, at eg má ríða hará, og fara til kongsins; av tí at tín tænari *er* lamin.

27 Og hann hevur baktalað tænara tín yvirfyri harra mínum kongi; men mín harri kongur *er* sum ein eingil Guðs: ger tí *hvat* gott *er* í eygum tínum.

28 Tí at allir *av* faðirs míns húsi vóru bert deyðir menn frammi fyri harra mínum konginum: tó settirt tú tænara tín millum teirra sum ótu við egna borð títt. Hvønn rætt, tessvegna, havi eg enn at rópa meira yvirfyri kongi?

29 Og kongur segði við hann, Hví talart tú meira um tíni málevnir? eg havi sagt, Tú og Zī´-bă býta landið.

30 Og Mĕ-phī´-bō-sjĕth segði við kong, Ja, lat hann taka alt, eftirsum *at* harri mín kongur er komin aftur í friði at egna húsi sínum.

31 ¶ Og Bâr-zĭl-lā´-ī Gileaditi kom oman til Rō´-gĕ-lĭm, og fór yvirum Jordan við kongi, at føra hann yvirum Jordan.

32 Nú, Bâr-zĭl-lā´-ī var ein sera aldraður maður, *enntá* fýrsinstjúgu ára gamalur: og hann hevði skaffað kongi av uppihaldi, meðan hann lá í Mă-há´-nă-ĭm; tí hann *var* ein sera mikil maður.

33 Og kongur segði við Bâr-zĭl-lā´-ī, Komi tygum yvirum við mær, og eg vil føða tygum hjá mær í Jerusalem.

34 Og Bâr-zĭl-lā´-ī segði við kong, Hvussu leingi havi eg at liva, at eg skuldi farið niðan við kongi at Jerusalem?

35 Eg *eri* henda dag fýrsinstjúgu ára gamalur: *og* kann eg greina ímillum gott og ilt? kann tænari tín smakka hvat eg eti, ella hvat eg drekki? kann eg meira hoyra røddina á syngjandi monnum og syngjandi kvinnum? hvørsvegna skuldi tænari tín tá verið enn ein byrði at harra mínum kongi?

36 Tín tænari vil fara ein lítlan veg yvirum Jordan við kongi: og hví skuldi kongur endurgoldið mær tað við slíkum endurgjaldi?

37 Lat tænara tín, eg biði teg, venda tilbakar aftur, at eg má doyggja í egna staði mínum, *og verða jarðaður* hjá grøv faðirs míns og móður mínar. Men sí tænara tín Chĭm´-hăm; lat hann fara yvirum við harra mínum kongi; og ger við hann hvat tykjast skal gott at tær.

38 Og kongur svaraði, Chĭm´-hăm skal fara yvirum við mær, og eg vil gera við hann tað sum tykjast skal gott at tær: og hvatsumhelst *ið* tú skalt fyrispyrja av mær, *tað* vil eg gera fyri teg.

39 Og alt fólkið fór yvirum Jordan. Og tá ið kongur var komin yvirum, kysti kongur Bâr-zĭl-lā´-ī, og vælsignaði hann; og hann vendi aftur at egna plássi sínum.

40 Tá fór kongur áfram til Gĭl´-găl, og Chĭm´-hăm fór áfram við honum: og alt fólkið av Judah førdi kong, og eisini helvtin av fólki Ísraels.

41 ¶ Og sí, allir menninir av Ísrael komu til kongs, og søgdu við kong, Hví hava brøður okkara, menninir av Judah, stjolið teg burtur, og hava ført kong, og húshald hans, og allar Dávids menn við honum, yvirum Jordan?
42 Og allir menninir av Judah svaraðu monnunum av Ísrael, Av tí at kongur *er* nær í slekt við okkum: hvørsvegna tá veri tit firtnir fyri hetta mál? hava vit etið yvirhøvur av *kostnaði* kongs? ella hevur hann givið okkum nakra gávu?
43 Og menninir av Ísrael svaraðu monnunum av Judah, og søgdu, Vit hava tíggju partar í kongi, og vit hava eisini meira *rætt* í Dávidi enn tit: hví vanvirdu tit tá okkum, at okkara tilráðing skuldi ei verða fyrst havd í at føra aftur kong váran? Og orðini hjá monnunum av Judah vóru ógvusligari enn orðini hjá monnunum av Ísrael.

KAPITUL 20

OG tað vildi til at vera har ein maður Bĕ-lī-ăl-s, hvørs navn *var* Sjē-bă, sonur Bĭch-rī-s, ein Benjamiti: og hann blásti ein lúður, og segði, Vit hava ongan part í Dávidi, eiheldur hava vit arv í syni Ísais: hvør maður til tjalda sína, O Ísrael.
2 So hvør maður av Ísrael legði avstað frá *at vera* aftaná Dávidi, *og* fylgdi Sjē-bă Bĭch-rī-s syni: men menninir av Judah krøktust at kongi sínum, frá Jordan enntá til Jerusalem.
3 ¶ Og Dávid kom til húsar síns í Jerusalem; og kongur tók tær tíggju kvinnurnar, *sínar* medkonur, hvørjar hann hevði eftirlatið at passa húsið, og setti tær í varðhald, og føddi tær, men fór ikki inn at teimum. So tær vóru lokaðar inni *fram*at degi deyða síns, livandi í einkjudómi.
4 ¶ Tá segði kongur til Á-mâ-să, Savna mær menninar av Judah innanfyri tríggjar dagar, og vert tú her tilstaðar.
5 So Á-mâ-să fór at savna *menninar av* Judah: men hann dvaldi longri enn ta ásettu tíðina sum hann hevði fyriskipað honum.
6 Og Dávid segði til Á-bĭ-sjâ-s, Nú skal Sjē-bă Bĭch-rī-s sonur gera okkum meiri skaða enn Ăb-să-lŏm *gjørdi:* tak tú tænarar harra tíns, og elt eftir honum, at ikki hann fái sær girdar staðir, og komist undan okkum.
7 Og tað fóru út aftaná honum Jó-ăb-s menn, og Chĕr-ē-thĭt-ar-nir, og Pē-lē-thĭt-arnir, og allir teir mektigu menninir: og teir fóru út úr Jerusalem, at elta eftir Sjē-bă Bĭch-rī-s syni.
8 Tá ið teir *vóru* við hin mikla steinin, sum *er* í Gibeon, fór Á-mâ-să undan teimum. Og klæðið hjá Jó-ăb-i, sum hann var farin í, var gyrt at honum, og uttan á tí ein gyrðil *við* einum svørði, fest uppá lendar hansara, í slíðra tess; og sum hann fór fram, datt tað úr.
9 Og Jó-ăb segði til Á-mâ-să, *Ert* tú við heilsu, bróðir mín? Og Jó-ăb tók Á-mâ-să eftir skegginum við høgru hondini til *tess* at kyssa hann.
10 Men Á-mâ-să gav einkið gætur eftir svørðinum, sum *var* í Jó-ăb-s hond: so hann sló hann við tí í hitt fimta *rivjabeinið,* og helti út innangoymslur hansara til jarðarinnar, og slerdi hann ikki aftur; og hann doyði. So Jó-ăb og Á-bĭ-sjâ-i, bróðir hansara, eltu eftir Sjē-bă Bĭch-rī-s syni.
11 Og ēin av Jó-ăb-s monnum stóð hjá honum, og segði; Hann sum hevur tokka í Jó-ăb-i, og hann sum *er* fyri Dávidi, *lat hann fara* aftaná Jó-ăb-i.
12 Og Á-mâ-să veltist í blóði á

miðjum høvuðsveginum. Og tá ið maðurin sá, at alt fólkið stóðu stillir, burtflutti hann Á-mâ-sá út av høvuðsveginum inn í akurin, og kastaði eina spjørr omanyvir hann, tá ið hann sá, at hvør tann, sum kom framvið hann, stóð stillur.

13 Tá ið hann var burtfluttur út av høvuðsveginum, fór alt fólkið áfram aftaná Jó-ăb-i, at elta eftir Sjē-bă Bĭch-rī-s syni.

14 ¶ Og hann fór ígjøgnum allar ættargreinir Ísraels at Ábel, og til Bĕth-má-ă-chăh, og allar Bē-rīt-arnar: og teir vórðu savnaðir saman, og fóru eisini eftir honum.

15 Og teir komu og kringsettu hann í Ábel Bĕth-má-ă-chŭh, og teir laðaðu upp ein bakka ímóti staðinum, og hann stóð í rennuni: og alt fólkið, sum *var* við Jó-ăb-i, bardu múrin, til at blaka hann niður.

16 ¶ Tá rópaði ein vís kvinna út úr staðinum, Hoyrið, hoyrið; sigið, eg biði tykkum, við Jó-ăb, Kom nær higar, at eg má tala við teg.

17 Og tá ið hann var komin nær at henni, segði kvinnan, *Ert* tú Jó-ăb? Og hann svaraði, Eg *eri hann*. Tá segði hon við hann, Hoyr orðini hjá tænastumoy tíni. Og hann svaraði, Eg hoyri.

18 Tá talaði hon, sigandi, Teir vóru vanir at tala í gamlari tíð, sigandi, Teir skulu vissuliga biðja *um tilráðing* í Ábel: og soleiðis endaðu teir *málið*.

19 Eg *eri ēin av teimum sum eru* friðsamlig *og* trúføst í Ísrael: tú søkirt at oyða ein stað og eina móðir í Ísrael: hví vilt tú svølgja upp arvalut HARRANS?

20 Og Jó-ăb svaraði og segði, Fjart veri tað, fjart veri tað frá mær, at eg skuldi svølgt upp, ella oytt.

21 Málið *er* ikki soleiðis: men ein maður av Ē-phră-ĭm fjalli, Sjē-bă Bĭch-rī-s sonur at navni, hevur lyft upp sína hond ímóti kongi, *enntá* ímóti Dávidi: flýggja hann einans, og eg vil fara avstað frá staðinum. Og kvinnan segði við Jó-ăb, Sí, hans høvur skal verða tveitt til tín yvirum múrin.

22 Tá fór kvinnan at øllum fólkinum í vísdómi sínum. Og teir skóru av høvur Sjē-bă Bĭch-rī-s sonar, og kastaðu *tað* út til Jó-ăb-s. Og hann blásti ein lúður, og teir tóku *seg* aftur frá staðinum, hvør maður til tjalds síns. Og Jó-ăb fór aftur til Jerusalem at kongi.

23 ¶ Nú, Jó-ăb *var* yvir øllum herliðinum av Ísrael: og Bĕnā-ăh Jē-hŏí-ă-dă sonur *var* yvir Chĕr-ē-thĭt-unum og yvir Pē-lē-thĭt-unum:

24 Og Á-dôr-ăm *var* yvir íkastinum: og Jē-hō-sjâ-phăt Á-hī-lŭd-s sonur *var* skrásetari:

25 Og Sjē-vă *var* skrivari: og Zā-dŏk og Ā-bī-ă-thâr *vóru* prestarnir:

26 Og Ĭ-ră eisini, Já-îr-ĭt-in, var ein fremstur stjórnari kring Dávid.

KAPITUL 21

TÁ var ein hungursneyð á døgum Dávids trý ár, ár eftir ár; og Dávid fregnaði av HARRANUM. Og HARRIN svaraði, *Tað er* fyri Saul, og fyri *hansara* blóðiga hús, av tí at hann vó Gibeonitarnar.

2 Og kongur kallaði Gibeonitarnar, og segði við teir; (nú, Gibeonitarnir *vóru* ikki av børnum Ísraels, men av leivdini av Amoritunum; og børn Ísraels høvdu svorið teimum: og Saul søkti at vega teir í vandlæti sínum fyri børn Ísraels og Judah.)

3 Hvørsvegna Dávid segði við Gibeonitarnar, Hvat skal eg gera fyri tykkum? og hvarvið skal eg

gera sáttargerðina, at tit mega vælsigna arvalut HARRANS?

4 Og Gibeonitarnir søgdu við hann, Vit vilja einkið silvur ella gull hava av Sauli, ella av húsi hans; eiheldur fyri okkum skalt tú drepa nakran mann í Ísrael. Og hann segði, Hvat tit skulu siga, *tað* vil eg gera fyri tykkum.

5 Og teir svaraðu kongi, Tann maður sum upptærdi okkum, og sum upphugsaði ímóti okkum, *at* vit skuldu verða oyddir frá at verða verandi í nøkrum av breddum Ísraels,

6 Lat sjey menn av sonum hansara verða flýggjaðar okkum, og vit vilja heingja teir upp yvirfyri HARRANUM í Gī-bē´-ŭh Sauls, *hvønn* HARRIN valdi. Og kongur segði, Eg vil geva *teir*.

7 Men kongur spardi Mĕ-phī´-bŏ-sjĕth, son Jónathans Sauls sonar, uppá grund av HARRANS eiði, sum *var* ímillum teir, ímillum Dávid og Jónathan Sauls son.

8 Men kongur tók teir tveir synirnar hjá Rīz´-pŭh Aî´-ăh dóttur, hvørjar hon føddi Sauli, Ârmŏ´-nī og Mĕ-phī´-bŏ-sjĕth; og teir fimm synirnar hjá Michal Sauls dóttur, hvørjar hon aldi upp fyri Ā´-drī-ĕl Bâr-zīl-lā´-ī-s son Mĕ-hó-lā-thīt´-a:

9 Og hann flýggjaði teir inn í hendur Gibeonitanna, og teir hongdu teir á heygnum frammi fyri HARRANUM: og teir fullu *allir* sjey saman, og vórðu tiknir av lívi í heystardøgunum, í teimum fyrstu *døgunum,* í byrjanini av bygg heysti.

10 ¶ Og Rīz´-păh Aî´-ăh dóttir tók sekkjaklæði, og breiddi tað til sín uppá klettin, frá byrjanini av heysti inntil vatn dryppaði uppá tey út úr himni, og loyvdi hvørki fuglum luftarinnar at hvíla á teimum um dag*in,* ella djórum markarinnar um nátt*ina*.

11 Og tað varð sagt Dávidi, hvat Rīz´-păh Aî´-ăh dóttir, medkona Sauls, hevði gjørt.

12 ¶ Og Dávid fór og tók beinini hjá Sauli og beinini hjá Jónathani, syni hansara, frá monnum Já´-bĕsj-gĭ´-lĕ-ăd-s, sum høvdu stjolið tey frá stræti Bĕth´-sjăn-s, har Philistarnir høvdu hongt teir, tá ið Philistarnir høvdu vigið Saul í Gĭl-bŏ´-ă:

13 Og hann førdi upp haðani frá beinini hjá Sauli og beinini hjá Jónathani, syni hansara; og teir savnaðu beinini hjá teimum sum vóru hongdir.

14 Og beinini hjá Sauli og Jónathani, syni hansara, jarðaðu teir í landi Benjamins í Zē´-lăh, í gravhýsi Kisj, faðirs hansara: og teir útintu alt sum kongur ábeyð. Og aftaná tað varð Guð bønaður fyri landið.

15 ¶ Harafturat høvdu Philistarnir enn kríggj aftur við Ísrael; og Dávid fór oman, og hansara tænarar við honum, og bardust ímóti Philistunum: og Dávid vaks ørmaktaður.

16 Og Ĭsj´-bî-bē´-nŏb, sum *var* av sonum risans, vektin á hvørs spjóti *vigaði* trý hundrað *sjē´-kl-ar* av messing í vekt, hann, verandi gyrdur við einum nýggjum *svørði,* hugsaði at havt vigið Dávid.

17 Men Á-bĭ-sjaî Zĕr-ū´-jŭh sonur kom honum til hjálpar, og sló Philistan, og drap hann. Menninir hjá Dávidi tá svóru at honum, sigandi, Tú skalt fara ei meira út við okkum til orrustu, at tú sløkki ikki ljós Ísraels.

18 Og tað bar á eftir hetta, at tað var aftur ein orrusta við Philistarnar í Gób: Sĭb´-bĕ-chaî Hûsjă-thīt´-i tá vá Saph, sum *var* av sonum risans.

19 Og tað var aftur ein orrusta í Gób við Philistarnar, har Ĕl-hā´-năn Jā´-ă-rē-ôr´-ĕ-gĭm-s sonur, ein Beth-lehemiti, vó *bróður* Gŏ´-lî-ăth-s Gīt-tīt´-a, stavurin á

hvørs spjóti *var* sum ein vevara bummur.

20 Og tað varð uppaftur ein orrusta í Gáth, hvar var ein maður av *miklum* vakstrarmáli, sum hevði á hvørji hond seks fingrar, og á hvørjum fóti seks tær, fýra og tjúgu í tali; og hann eisini var føddur til risans.

21 Og tá ið hann trossaði Ísrael, vó Jónathan Sjïm´-ē-ă sonur, bróðir Dávids, hann.

22 Hesir fýra vórðu føddir til risans í Gáth, og fullu viðˆ hendi Dávids, og viðˆ hondini á tænarum hans.

KAPITUL 22

OG Dávid talaði við HARRAN orðini av hesum songi, á tí degi *sum* HARRIN hevði útfríað hann út úr hondini á øllum hansara figgindum, og út úr hondini á Sauli:

2 Og hann segði, HARRIN *er* klettur mín, og festningur mín, og mín útfríari;

3 Guð klettar míns; á hann vil eg troysta: *hann er* mín skjøldur, og horn frelsu mínar, mítt høga torn, og skjól mítt, frelsari mín; tú frelsirt meg frá harðskapi.

4 Eg vil kalla á HARRAN, *sum er* verdur at verða prísaður: so skal eg verða frelstur frá mínum figgindum.

5 Tá ið deyðans bárur umringaðu meg, flóðirnar av ógudiligum monnum gjørdu meg ræddan;

6 Sorgir helvitis umringaðu meg umkring; deyðans snerrur komu mær á møti;

7 Í míni neyð eg kallaði uppá HARRAN, og rópaði til Guðs míns: og hann hoyrdi mína rødd úr templi sínum, og mítt róp *innfór* inn í oyru hans.

8 Jørðin tá skalv og nøtraði; grundvøllir himins fluttust og ristust, av tí at hann var vreiður.

9 Tað fór upp ein roykur út úr nasum hans, og eldur út úr hans munni upptærdi: kol vórðu kynd av tí.

10 Hann boygdi himnarnar eisini, og kom niður; og myrkur *var* undir fótum hans.

11 Og hann reið uppiá einum cherubi, og fleyg: og hann varð sæddur uppiá veingjum vindsins.

12 Og hann gjørdi myrkur *til* tjaldbúðir rundan um seg, myrk vøtn, *og* tjúkk skýggj loftanna.

13 Gjøgnum bjartleikan frammanfyri honum vórðu kol av eldi kynd.

14 HARRIN sló toru frá himni, og hin mest Høgi mælti rødd síni.

15 Og hann sendi út ørvar, og spjaddi teir; snarljós, og uppskakaði teir.

16 Og sævarins rennur komu til sjóndar, grundvøllir veraldarinnar vórðu avhuldir, við hartan HARRANS, við blakinum av andadráttinum av nasum hans.

17 Hann sendi úr erva, hann tók meg; hann dró meg út úr mongum vøtnum;

18 Hann útfríaði meg frá mínum sterka figginda, *og* frá teimum sum hataðu meg: tí at teir vóru ov sterkir hjá mær.

19 Teir komu mær á møti á deginum av mínum skaðatilburði: men HARRIN var stuðul mín.

20 Hann førdi meg fram eisini inn í eitt stórt pláss: hann útfríaði meg, av tí at hann fragdaðist í mær.

21 HARRIN endurgalt mær samsvarandi við mína rættvísi: samsvarandi við reinleikan av mínum hondum hevur hann viðurgoldið mær.

22 Tí at eg havi hildið vegir HARRANS, og havi ikki vondligani vikið frá Guði mínum.

23 Tí at allir hansara dómar *vóru* frammi fyri mær: og *hvat viðvíkur* ásetingum hans, eg veik ikki frá teimum.

24 Eg var eisini rættiligur frammi fyri honum, og havi hildið meg frá míni misgerð.
25 Tí hevur HARRIN endurgoldið mær samsvarandi við mína rættvísi; samsvarandi við reinleika mín í eygsjón síni.
26 Hjá tí miskunnarfulla, tú vilt sýna teg sjálvan miskunnarfullan, *og* hjá tí reiðiliga manninum, tú vilt sýna teg sjálvan reiðiligan.
27 Hjá tí reina, tú vilt sýna teg sjálvan reinan; og hjá tí rangvørga, tú vilt sýna teg sjálvan ósmakksaman.
28 Og tað nívda fólkið tú vilt frelsa: men tíni eygu *eru* uppá hinar hástóru, *at* tú mást føra *teir* niður.
29 Tí at tú *ert* mín lampa, O HARRI: og HARRIN vil lýsna mítt myrkur.
30 Tí at við^ tær havi eg runnið ígjøgnum eina fylking: við^ mínum Guði havi eg lopið uppum ein múr.
31 *Hvat viðvíkur* Guði, hansara vegur *er* fullkomin; HARRANS orð *er* roynt: hann *er* ein skjøldur fyri øllum teimum sum troysta á hann.
32 Tí at hvør *er* Guð, uttan HARRIN? og hvør *er* ein klettur, uttan Guð vár?
33 Guð *er* mín styrki *og* kraft: og hann ger veg mín fullkomnan.
34 Hann ger mínar føtur sum hinda *føtur:* og setur meg uppá míni høgu støð.
35 Hann lærir mínar hendur at kríggjast; so at ein bogi av stál verður brotin av ørmum mínum.
36 Tú hevurt eisini givið mær skjøldur frelsu tínar: og tín mildni hevur gjørt meg miklan.
37 Tú hevurt størrað um míni fet undir mær; so at føtur mínir gliðu ikki.
38 Eg havi elt mínar fíggindar, og oytt teir; og vendi ikki aftur, fyrrenn eg hevði upptært teir.
39 Og eg havi upptært teir, og sært teir, at teir kundu ikki reisast: ja, teir eru falnir undir fótum mínum.
40 Tí at tú hevurt gyrt meg við styrki til orrustu: teir, sum risu upp ímóti mær, hevurt tú undirlagt undir meg.
41 Tú hevurt eisini givið mær nakkarnar á mínum fíggindum, at eg mátti oyða teir sum hata meg.
42 Teir hugdu, men *har var* eingin at frelsa; *enntá* á HARRAN, men hann svaraði teimum ikki.
43 Tá bardi eg teir so smáar sum dust jarðarinnar, eg trampaði teir sum evjuna í strætinum, *og* spreiddi teir útumkring.
44 Tú eisini hevurt útfríað meg frá trætingum fólks míns, tú hevurt varðað meg *til at vera* høvd hinna heidnu: eitt fólk, *sum* eg ei kendi, skal tæna mær.
45 Fremmandir skulu undirgeva seg sjálvar mær: so skjótt sum teir hoyra, skulu teir vera lýdnir mær.
46 Fremmandir skulu svinna burt, og teir skulu vera ræddir úr sínum trongu plássum.
47 HARRIN livir; og vælsignaður *veri* klettur mín; og upphevjaður veri Guð klettar frelsu mínar.
48 Tað *er* Guð sum hevnir *fyri* meg, og sum førir niður fólkið undir meg,
49 Og sum førir meg fram frá fíggindum mínum: tú eisini hevurt lyft meg upp til hæddar, uppum teir sum risu upp ímóti mær: tú hevurt útfríað meg frá tí harðliga manninum.
50 Tí vil eg geva tær tøkkir, O HARRI, hinna heidnu millum, og eg vil syngja *lovprís*ing*ar* at navni tínum.
51 *Hann er* frelsutornið hjá kongi sínum: og sýnir miskunn mót salvaða sínum, at Dávidi, og fyri sáði hans um ævirmeir.

KAPITUL 23

NÚ, hesi *veri* hini síðstu orð Dávids. Dávid Ísais sonur segði, og maðurin *sum varð* reistur upp til hæddar, tann salvaði Guðs Jákobs, og Ísraels søti psálmistur, segði,

2 HARRANS Andi talaði viðˆmær, og hans orð *var* í míni tungu.

3 Ísraels Guð segði, Ísraels Klettur talaði til mín, Hann, sum stjórnar yvir monnum, *má vera* rættlátur, stjórnandi í ótta Guðs.

4 Og *hann skal vera* sum ljós morgunsins, *tá ið* sólin rísur, *enntá* ein morgun uttan skýggjˇ; *sum* tað mjúka grasið, *sprettandi* burtur úr jørðini, við klárum skini eftir regn.

5 Hóast mítt hús ei *veri* soleiðis hjá Guði; tó hevur hann gjørt við meg ein ævigtvarandi sáttmála, skipaðan í øllum *lutum,* og vissan: tí at *hetta er* øll mín frelsa, og øll *mín* trá, hóast hann fái *tað* ei at grógva.

6 ¶ Men *synir* Bē´-lĭ-ăl-s *skulu verða* allir av teimum sum tornir stoyttir burtur, av tí at teir kunnu ei verða tiknir við hondum:

7 Men maðurin, *sum* skal nema við teir, má vera girdur við jarni og stavinum av einum spjóti; og teir skulu fullkomiliga verða brendir við eldi í tí *sama* plássinum.

8 ¶ Hesi *veri* nøvnini hjá teimum mektigu monnunum sum Dávid hevði: Tăch-mô-nĭt´-in, sum sat í sætinum, fremstur millum høvuðsmenninar; hin sami *var* Ăd´-ĭ-nō Ēz-nĭt´-i: *hann lyfti upp spjóti sínum* ímóti átta hundrað, hvørjar hann vó um ēina leið.

9 Og eftir hann *var* Ĕl-ĕ-ā´-zâr, sonur Dodo-s Ă-hô-hĭt´-a, *ēin* av teimum trimum mektigu monnunum við Dávidi, tá ið teir trossaðu Philistarnar, *sum* vóru har savnaðir saman til orrustu, og menninir av Ísrael vóru farnir avstað:

10 Hann reistist, og sló Philistarnar, inntil hond hansara var lúgvað, og hond hansara krøktist at svørðinum: og HARRIN virkaði ein miklan sigur tann dagin; og fólkið vendi aftur eftir honum bara til at *taka* herfong.

11 Og eftir hann *var* Sjăm´măh Á´-gēē sonur Hâr-ă-rĭt´-i. Og Philistarnir vóru savnaðir saman í eina fylking, hvar var eitt stykki av jørð, fult av flatbønum: og fólkið flýddi frá Philistunum.

12 Men hann stóð í miðjum lendinum, og vardi tað, og vó Philistarnar: og HARRIN virkaði ein miklan sigur.

13 Og tríggir av teimum tríati fremstu fóru oman, og komu til Dávids í heystartíðini at helli Adullams: og fylking Philistanna sló upp í Rē´-phă-ĭm-s dalinum.

14 Og Dávid *var* tá í einum virki, og setuliðið hjá Philistunum *var* tá *í* Beth-lehem.

15 Og Dávidi longdist, og segði, Á, at ein vildi givið mær drykk av vatninum úr brunni Beth-lehem-s, sum *er* við portrið!

16 Og teir tríggir mektigu menninir brutu ígjøgnum herliðini hjá Philistunum, og drógu vatn út úr brunni Beth-lehem-s, sum *var* við portrið, og tóku *tað,* og førdu *tað* til Dávids: hóast hetta, hann vildi ikki drekka harav, men helti tað út at HARRANUM.

17 Og hann segði, Veri tað fjart frá mær, O HARRI, at eg skuldi gjørt hetta: *er ikki hetta* blóðið av monnunum sum fóru í váða um lív síni? tí vildi hann ikki drekka tað. Hesar lutir gjørdu hesir tríggir mektigu menn.

18 Og Á´-bĭ-sjâi, bróðir Jó´-ăb-s, sonur Zĕr-ū´-jăh, var fremstur millum tríggjar. Og hann lyfti

upp sínum spjóti ímóti trý hundrað, *og* vó *teir,* og hevði navnið millum tríggjar.

19 Var hann ikki mest heiðursamur av trimum? tí var hann teirra høvuðsmaður: hvussu enn er, hann náddi ikki at teimum *fyrstu* trimum.

20 Og Bĕ-naĭ´ăh Jĕ-hoĭ´-ă-dă sonur, sonurin at einum reystmenni, úr Kăb´-zeēl, hvør gjørt hevði mangar gerningar, hann vó tveir leyvu-líkar menn úr Móab: hann fór niður eisini og vó eina leyvu í miðjuni av eini holu í snjótíð:

21 Og hann vó ein Egypta, ein glæsiligan mann: og Egyptin hevði eitt spjót í hond síni; men hann fór oman til hansara við einum stavi, og sleit spjótið út úr hond Egyptans, og vó hann við egna spjóti hans.

22 Hesar *lutir* gjørdi Bĕ-naĭ´ăh Jĕ-hoĭ´-ă-dă sonur, og hevði navnið millum tríggjar mektigar menn.

23 Hann var meiri heiðursamur enn teir tríati, men hann náddi ikki til hinar *fyrstu* tríggjar. Og Dávid setti hann yvir lívverju síni.

24 Ás´-ă-hĕl, bróðir Jó´-ăb-s, *var* ēin av teimum tríati; Ĕl-hā´-năn Dodo-s sonur úr Beth-lehem,

25 Sjăm´-măh Hâr-ŏd-ĭt´-i, Ê-lĭ´-kă Hâr-ŏd-ĭt´-i,

26 Hē´-lĕz Păl-tĭt´-i, Ĭ´-ră Ĭk´-kĕsj sonur Tĕ-kô-ĭt´-i,

27 Ă-bī-ē´-zĕr Ăn-ē-thô-thĭt´-i, Mē-bŭn´-naĭ Hû-sjă-thĭt´-i,

28 Zăl´-mŏn Ă-hô-hĭt´-i, Má´-hă-raĭ Nē-tôph-â-thĭt´-i,

29 Hē´-lĕb Bā´-ă-năh sonur, ein Nē-tôph-â-thĭt´-i, Ĭt-tā´-ī Rī-bā´-ī-s sonur úr Gĭ-bē´-ūh, av børnum Benjamins,

30 Bĕ-naĭ´-ăh Pî-râ-thŏn-ĭt´-i, Hĭd-dā´-ī úr áarløkum Gá´-ăsj,

31 Ā´-bī-ăl´-bŏn Ăr-bă-thĭt´-i, Ăz-má´-vĕth Bâr-hû-mĭt´-i,

32 Ê-lī-âh´-bă Sjā-ăl-bô-nĭt´-i, av sonum Jăsj´-ĕn-s, Jónathan,

33 Sjăm´-măh Hâr-ă-rĭt´-i, Á´-hĭ-ăm Sjár´-âr-s sonur Hâr-ă-rĭt´-i,

34 Ê-lĭph´-ĕ-lĕt Ă-hăs´-baĭ-s sonur, sonar Má-ăch-â-thĭt´-an-s, Ē´-lī-ăm Ă-hĭth´-ŏ-phĕl-s sonur Gî-lô-nĭt´-i,

35 Hĕz´-râ-ī Carmeliti, Pá´-ă-raĭ Âr-bĭt´-i,

36 Ĭ´-găl Náthans sonur úr Zō´-băh, Bá´-nī Gáditi,

37 Zē´-lĕk Ammoniti, Ná´-hă-raĭ Bēēr-ô-thĭt´-i, brynjuberi fyri Jó´-ăb Zĕr-ū´-jŭh syni,

38 Ĭ´-ră — ein Ĭth-rĭt´-i, Gá´-rĕb — ein Ĭth-rĭt´-i,

39 Ū´-rī-ăh Hittiti: tríati og sjey í alt.

KAPITUL 24

OG aftur varð vreiði HARRANS kynd ímóti Ísrael, og hann rørdi Dávid ímóti teimum til at siga, Farið, upptelji Ísrael og Judah.

2 Tí at kongur segði til Jó´-ăb-s, høvuðsmans herliðsins, sum *var* hjá honum, Farið nú ígjøgnum allar ættargreinir Ísraels, frá Dán enntá til Bēēr´-sjĕ-bŭ, og upptelji tit fólkið, at eg má vita talið á fólkinum.

3 Og Jó´-ăb segði við kong, Nú, HARRIN Guð tín leggi afturat fólkinum, hvussu mangir sumhelst *ið* teir veri *seg,* eitt hundraðfalt, og at eygu harra míns kongs mega sjá *tað:* men hví fragdast harri mín kongur í hesum luti?

4 Hóast hetta, orðið hjá kongi hevði yvirvág ímóti Jó´-ăb-i, og ímóti høvuðsmonnunum av herliðinum. Og Jó´-ăb og høvuðsmenninir av herliðinum fóru út frá nærveru kongsins, at upptelja fólk Ísraels.

5 ¶ Og teir fóru yvirum Jordan, og slógu upp í Á´-rō-ēr, høgrumegin við staðin sum *liggur* í miðjuni av Gáds ánni, og ímóti Jā´-zēr:

6 Síðan komu teir til Gilead, og til lands Tâh′-tĭm-hŏd′-sjī-s; og teir komu til Dán-jā′-ăn, og íkring til Zī′-dŏn,

7 Og komu til vígvirkis Týrusar, og til alra staða Hī-vĭt′-anna, og Cānaanitanna: og teir fóru út til suður*luta* Judah, *enntá* til Bēēr′-sjĕ-bŭ.

8 So tá ið teir høvdu farið í-gjøgnum alt landið, komu teir til Jerusalem við endan á níggju mánaðum og tjúgu døgum.

9 Og Jó′-ăb gav upp samløguna av talinum á fólkinum at kongi: og tað vóru í Ísrael átta hundrað túsund reystir menn, sum drógu svørðið; og menninir av Judah *vóru* fimm hundrað túsund menn.

10 ¶ Og Dávids hjarta sló hann, eftir at hann hevði upptalt fólkið. Og Dávid segði við HARRAN, Eg havi syndað stórligani í tí *sum* eg havi gjørt: og nú, eg bøni teg, O HARRI, tak burtur misgerðina hjá tænara tínum; tí at eg havi gjørt sera dársamliga.

11 Tí at tá ið Dávid var uppi um morgunin, kom orð HARRANS at prophetinum Gád, síggjara Dávids, sigandi,

12 Far og sig við Dávid, Svá sigur HARRIN, eg bjóði tær trý *ting;* vel tær ĕitt av teimum, at eg má *gera tað* at tær.

13 So Gád kom til Dávids, og taldi honum, og segði við hann, Skulu sjey ár av hungursneyð koma at tær í landi tínum? ella vilt tú flýggja tríggjar mánaðir frammanfyri fíggindum tínum, meðan teir elta teg? ella at tað verði tríggja daga drepsótt í landi tínum? nú, ráðfør *teg*, og síggj hvat svar eg skal endurbera til hansara sum sendi meg.

14 Og Dávid segði við Gád, Eg eri í eini miklari trongstøðu: latum okkum falla nú inn í hond HARRANS; tí hansara miskunnir *eru* miklar: og lat meg ikki falla inn í hond mans.

15 ¶ So HARRIN sendi eina drepsótt uppá Ísrael frá morgninum enntá til tíðina fyriskipaðu: og tað doyðu av fólkinum frá Dán enntá til Bēēr′-sjĕ-bŭ sjeyti túsund menn.

16 Og tá ið eingilin strekti út hond sína uppá Jerusalem til at oyða tað, iðraði HARRIN seg um tað illa, og segði til eingilin sum oyddi fólkið, Tað er nóg mikið: steðga nú hond tíni. Og eingil HARRANS var við treskigólv Ă-raŭ′-năh Jĕb-ŭ-sīt′-a.

17 Og Dávid talaði við HARRAN, tá ið hann sá eingilin sum sló fólkið, og segði, Sí, eg havi syndað, og eg havi gjørt vondliga: men hesir seyðir, hvat hava teir gjørt? lat hond tína, eg biði teg, vera ímóti mær, og ímóti húsi faðirs míns.

18 ¶ Og Gád kom tann dagin til Dávids, og segði við hann, Far niðan, reis eitt altar at HARRANUM í treskigólvi Ă-raŭ′-năh Jĕb-ŭ-sīt′-a.

19 Og Dávid, samsvarandi við framsøgnina hjá Gádi, fór niðan, eins og HARRIN ábeyð.

20 Og Ă-raŭ′-năh hugdi, og sá kong og hansara tænarar komandi áfram ímóti sær: og Ă-raŭ′-năh fór út, og boygdi seg frammi fyri kongi á andlit sítt uppá jørðina.

21 Og Ă-raŭ′-năh segði, Hvørsvegna er harri mín kongur komin til tænara síns? Og Dávid segði, At keypa treskigólvið av tær, at byggja eitt altar at HARRANUM, at plágan má verða steðgað frá fólkinum.

22 Og Ă-raŭ′-năh segði við Dávid, Lat harra mín kong taka og ofra upp hvat honum *tykir* gott: sí, *her veri* oksar til brennioffur, og treskiamboð˙ og *onnur* amboð av oksunum til við˙.

23 Allar hesar *lutir* gav Ă-raŭ-năh, *sum* ein kongur, kongi. Og Ă-raŭ-năh segði við kong, HARRIN Guð tín taki ímóti tær.

24 Og kongur segði við Ă-raŭ-năh, Nei; men eg vil vissuliga keypa *tað* av tær til ein prís: eiheldur vil eg ofra brennioffur˘ at HARRANUM Guði mínum av tí sum einkið kostar mær. So Dávid keypti treskigólvið og oksarnar fyri fimti sjē-kl-ar av silvuri.

25 Og Dávid bygdi har eitt altar at HARRANUM, og ofraði brennioffur˘ og friðoffur˘. So HARRIN varð bønaður fyri landið, og plágan varð steðgað frá Ísrael.

HIN FYRRA

BÓK KONGANNA,

VANLIGA KALLAÐ,

HIN TRIÐJA BÓK KONGANNA.

KAPITUL 1

NÚ, Dávid kongur var gamal *og* sligin í árum; og teir dekkaðu hann við klæðum, men hann fekk ongan hita.

2 Hvørsvegna hansara tænarar søgdu við hann, Lat tað verða søkt til harra mín kong ein ung jomfrú: og lat hana standa frammi fyri kongi, og lat hana hjúkla *um* hann, og lat hana liggja í favni tínum, at harri mín kongur má fáa hita.

3 So teir søktu eftir eini vakrari gentu út gjøgnum allar breddar Ísraels, og funnu Á-bī-sjăg, eina Sjû-năm-mĭt´-u, og førdu hana til kongs.

4 Og gentan *var* sera vøkur, og hjúklaði *um* kong, og tænti móti honum: men kongur kendi hana ikki.

5 ¶ Ăd-ō-nī´-jăh Hăg´-gĭth-s sonur tá upphevjaði seg sjálvan, sigandi, Eg vil vera kongur: og hann tilbúði sær vagnar og hestmenn, og fimti menn at renna frammanfyri sær.

6 Og faðir hansara hevði ikki misnøgdað hann til nakra tíð í at siga, Hví hevurt tú gjørt so? og hann eisini *var* ein sera stásiligur *maður;* og *móðir hansara* føddi hann aftaná Ăb´-să-lōm.

7 Og hann ráðførdist við Jó´-ăb Zĕr-ū´-jŭh son, og við Ā´-bĭ-ă-thăr prest: og teir, fylgjandi Ăd-ō-nī´-jăh, hjálptu *honum*.

8 Men Zā´-dŏk prestur, og Bĕ-năĭ´-ăh Jĕ-hŏĭ´-ă-dă sonur, og Náthan prophetur, og Sjĭm´-ĕ-ī, og Rē´-ī, og teir mektigu menninir sum *hoyrdu* til Dávids, vóru ikki við Ăd-ō-nī´-jăh.

9 Og Ăd-ō-nī´-jăh slátraði seyð og oksar og feitan fenað við stein Zō´-hĕ-lĕth-s, sum *er* við Ĕn-rō´-gĕl, og kallaði allar brøður sínar — kongssynirnar, og allar menninar av Judah — tænarar kongs:

10 Men Náthan prophet, og Bĕ-năĭ´-ăh, og teir mektigu menninar, og Sálomon, bróður sín, kallaði hann ikki.

11 ¶ Hvørsvegna Náthan talaði við Băth´-sjĕ-bū, móður Sálomons, sigandi, hevurt tú ikki hoyrt, at Ăd-ō-nī´-jăh Hăg´-gĭth-s sonur ríkir, og Dávid, harri okkara, veit *tað* ikki?

12 Nú tessvegna kom, lat meg, eg biði teg, geva tær tilráðing, at tú mást bjarga egna lívi tínum, og lívi sonar tíns Sálomons.

13 Far og slepp tær inn at Dávidi kongi, og sig við hann, Svórt ikki tú, harri mín, O kongur, innat tænastumoy tíni, sigandi, Vissuliga, Sálomon, sonur tín, skal ríkja eftir meg, og hann skal sita uppiá hásæti mínum? hví ríkir tá Ăd-ō-nī´-jăh?

14 Sí, meðan tú enn talart har við kong, eg eisini vil koma inn eftir teg, og staðfesta orð tíni.

15 ¶ Og Băth´-sjĕ-bă fór inn at kongi inn í kamarið: og kongur var sera gamalur; og Á´-bĭ-sjăg, Sjū-năm-mĭt´-an, tænti at kongi.

16 Og Băth´-sjĕ-bă boygdi *seg,* og inti heiðurslútan yvirfyri kongi. Og kongur segði, Hvat vildirt tú?

17 Og hon segði við hann, Mín harri, tú svórt við HARRAN Guð tín yvirfyri tænastumoy tíni, *sigandi,* Vissuliga, Sálomon, sonur tín, skal ríkja eftir meg, og hann skal sita uppiá hásæti mínum.

18 Og nú, sí, Ăd-ō-nī´-jăh ríkir; og nú, harri mín kongur, tú veitst *tað* ikki:

19 Og hann hevur slátrað oksar og feitan fenað og seyð í ríkiligleika, og hevur kallað allar synir kongs, og Á´-bĭ-ă-thâr prest, og Jó´-ăb, høvuðsmannin av herliðinum: men Sálomon, tænara tín, hevur hann ikki kallað.

20 Og tú, harri mín, O kongur, eyguni á øllum Ísrael *eru* uppá teg, at tú skuldirt siga teimum, hvør skal sita á hásæti harra míns kongs eftir hann.

21 Annars skal tað bera á, tá ið harri mín kongur skal sova hjá fedrum sínum, at eg og sonur mín Sálomon skulu verða roknað brotsgerarar.

22 ¶ Og sí, meðan hon enn talaði við kong, kom Náthan prophetur eisini inn.

23 Og tey taldu kongi, sigandi, Sí Náthan prophet. Og tá ið hann var komin inn framfyri kong, boygdi hann seg frammi fyri kongi við andliti sínum til jarðarinnar.

24 Og Náthan segði, Mín harri, O kongur, hevurt tú sagt, Ăd-ō-nī´-jăh skal ríkja eftir meg, og hann skal sita uppiá hásæti mínum?

25 Tí at hann er farin oman henda dag, og hevur slátrað oksar og feitan fenað og seyð í ríkiligleika, og hevur kallað allar kongssynirnar, og høvuðsmenninar av herliðinum, og Á´-bĭ-ă-thâr prest; og sí, teir eta og drekka frammi fyri honum, og siga, Guð varði Ăd-ō-nī´-jăh kong.

26 Men meg, *enntá* meg, tænara tín, og Zā´-dŏk prest, og Bĕ-nā´-ăh Jĕ-hŏí´-ă-dă son, og tænara tín Sálomon, hevur hann ikki kallað.

27 Er hetta tingið gjørt av harra mínum kongi, og tú hevurt ikki sýnt *tað* at tænara tínum, hvør *ið* skuldi sita á hásæti harra míns kongs eftir hann?

28 ¶ Tá svaraði Dávid kongur og segði, Kallið mær Băth´-sjĕ-bū. Og hon kom inn í nærveru kongs, og stóð frammi fyri kongi.

29 Og kongur svór, og segði, *Sum* HARRIN livir, sum hevur endurloyst sál mína út úr allari neyð,

30 Enntá sum eg svór innat tær við HARRAN Guð Ísraels, sigandi, Vissuliga, Sálomon, sonur tín, skal ríkja eftir meg, og hann skal sita uppiá hásæti mínum í mítt stað; enntá soleiðis vil eg vissuliga gera henda dag.

31 Tá boygdi Băth´-sjĕ-bă *seg* við andliti *sínum* til jarðarinnar, og inti heiðurslútan móti kongi, og segði, Lat harra mín, Dávid kong, liva um ævir.

32 ¶ Og Dávid kongur segði, Kallið mær Zā´-dŏk prest, og Náthan prophet, og Bĕ-nā´-ăh

Jĕ-hōĭ´-ă-dă son. Og teir komu framfyri kong.

33 Kongur eisini segði við teir, Takið við tykkum tænararnar hjá harra tykkara, og elvið Sálomoni, syni mínum, at ríða uppiá egna múldjóri mínum, og førið hann oman til Gĭ´-hŏn:

34 Og latið Zā´-dŏk prest og Náthan prophet salva hann har *til* kong yvir Ísrael: og blásið tit við lúðrinum, og sigið, Guð varði Sálomon kong.

35 Síðan skulu tit koma upp aftaná honum, at hann má koma og sita uppiá hásæti mínum; tí at hann skal vera kongur í mítt stað: og eg havi útnevnt hann til at vera stjórnara yvir Ísrael og yvir Judah.

36 Og Bĕ-naĭ´-ăh Jĕ-hōĭ´-ă-dă sonur svaraði kongi, og segði, Ā´-mĕn: HARRIN Guð harra míns kongs sigi so *við*.

37 Eins og HARRIN hevur verið við harra mínum kongi, enntá soleiðis veri hann við Sálomoni, og geri hásætið hjá honum miklari enn hásætið hjá harra mínum Dávid kongi.

38 So Zā´-dŏk prestur, og Náthan prophetur, og Bĕ-naĭ´-ăh Jĕ-hōĭ´-ă-dă sonur, og Chĕr-ē-thĭt´-arnir, og Pĕ-lē-thĭt´-arnir, fóru oman, og voldu Sálomoni at ríða uppiá múldjóri Dávids kongs, og førdu hann til Gĭ´-hŏn.

39 Og Zā´-dŏk prestur tók eitt horn av olju út úr tabernaklinum, og salvaði Sálomon. Og teir blástu lúðurin; og alt fólkið segði, Guð varði Sálomon kong.

40 Og alt fólkið kom upp aftaná honum, og fólkið pípaði við *ljóð*pípum, og fegnaðist við miklari frøi, so at jørðin skrædnaði við ljóðinum av teimum.

41 ¶ Og Ăd-ō-nī´-jăh og allir gestirnir, sum *vóru* hjá honum, hoyrdu *tað, beint* sum teir høvdu lokið við at eta. Og tá ið Jó´-ăb hoyrdi ljóðið av lúðrinum, segði hann, Hvørsvegna *er hetta* ljóðið av staðinum verandi í einum uppstigi?

42 Og meðan hann enn talaði, sí, Jónathan, sonur Ā´-bĭ-ă-thârs prests, kom: og Ăd-ō-nī´-jăh segði við hann, Kom inn; tí at tú *ert* ein reystur maður, og bert góð tíðindir.

43 Og Jónathan svaraði og segði til Ăd-ō-nī´-jăh, Sanniliga, harri okkara Dávid kongur hevur gjørt Sálomon *til* kong.

44 Og kongur hevur sent við honum Zā´-dŏk prest, og Náthan prophet, og Bĕ-naĭ´-ăh Jĕ-hōĭ´-ă-dă son, og Chĕr-ē-thĭt´-ar-nar, og Pĕ-lē-thĭt´-arnar, og teir hava volt honum at ríða uppiá múldjóri kongs:

45 Og Zā´-dŏk prestur og Náthan prophetur hava salvað hann *til* kong í Gĭ´-hŏn: og teir eru komnir upp haðani frá fagnandi, so at *tað* rang aftur *í* staðinum. Hetta *er* gangurin, sum tit hava hoyrt.

46 Og eisini Sálomon situr á hásæti kongadømisins.

47 Og harafturat, tænarar kongs komu at vælsigna harra okkara Dávid kong, sigandi, Guð geri navn Sálomons betri enn navn títt, og geri hásæti hansara miklari enn hásæti títt. Og kongur boygdi seg uppiá songini.

48 Og eisini svá segði kongur, Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Ísraels, sum hevur givið *ēin* til at sita á hásæti mínum henda dag, míni eygu enntá síggjandi *tað*.

49 Og allir gestirnir, sum *vóru* hjá Ăd-ō-nī´-jăh, vórðu ræddir, og risu upp, og fóru hvør maður sín veg.

50 ¶ Og Ăd-ō-nī´-jăh óttaðist vegna Sálomons, og reistist, og fór, og tók hald á hornum altarsins.

51 Og tað varð talt Sálomoni,

sigandi, Sí, Ăd-ō-nī´-jăh óttast Sálomon kong: tí at sí, hann hevur tikið hald á hornum altarsins, sigandi, Lat Sálomon kong svørja at mær í dag, at hann vil ikki vega tænara sín við svørðinum.

52 Og Sálomon segði, Um hann vil sýna seg sjálvan ein verdigan mann, skal ikki eitt hár av honum falla til jarðarinnar: men um vondska skal verða funnin í honum, skal hann doyggja.

53 So Sálomon kongur sendi, og teir førdu hann oman frá altarinum. Og hann kom og boygdi seg fyri Sálomon kongi: og Sálomon segði við hann, Far til húss tíns.

KAPITUL 2

NÚ, dagarnir hjá Dávidi drógust nær, at hann skuldi doyggja; og hann álegði Sálomoni, syni sínum, sigandi,

2 Eg fari veg alrar jarðarinnar: vert tú sterkur tessvegna, og sýn teg sjálvan ein mann;

3 Og halt álegging HARRANS Guðs tíns, at ganga í vegum hans, at halda ásetingar hans, og boðini hjá honum, og dómar hans, og vitnisburðir hans, eins og skrivað stendur í lóg Mósesar, at tú mást framganga í øllum sum tú gert, og hvagarsumhelst tú vendirt tær:

4 At HARRIN má halda áfram sítt orð, sum hann talaði viðvíkjandi mær, sigandi, Um tíni børn gevi gætur eftir vegi sínum, at ganga frammi fyri mær í sannleika við øllum hjarta sínum og við allari sál síni, skal tað ikki svitast tær, (segði hann,) ein mann á hásæti Ísraels.

5 Harafturat veitst tú eisini, hvat Jó´-ăb Zĕr-ū´-jūh sonur gjørdi við meg, *og* hvat hann gjørdi við teir tveir høvuðsmenninar av herliðum Ísraels, innat Abneri Nērs syni, og innat Á´-mâ-să Jē´-thĕr-s syni, hvørjar hann vó, og í friðartíð úthelti krígsblóðið, og koyrdi krígsblóðið uppá gyrðil sín sum *var* um lendar hansara, og í sínar skógvar sum *vóru* á fótum hansara.

6 Ger tí samsvarandi við vísdóm tín, og lat ikki hansara gráa høvd fara niður til gravarinnar í friði.

7 Men sýn blídni at sonum Bâr-zĭl-lā´-ī-s Gileadita, og lat teir vera av teimum sum eta við borð títt: tí at soleiðis komu teir til mín, tá ið eg flýddi uppá grund av Ăb´-să-lŏm-i, bróður tínum.

8 Og sí, *tú hevurt* hjá tær Sjĭm´-ĕ-ī Gera son, ein Benjamit úr Bă-hū´-rĭm, sum bannaði meg við eini herviligari banning á tí degi tá ið eg fór til Mă-há´-nă-ĭm: men hann kom oman at hitta meg við Jordan, og eg svór fyri honum við HARRAN, sigandi, Eg vil ikki taka teg av lívi við svørðinum.

9 Nú tessvegna, halt hann ikki sakleysan: tí at tú *ert* ein vísur maður, og veitst hvat tú áttirt at gera innat honum; men hansara gráa høvd føri tú niður til gravarinnar við blóði.

10 So Dávid svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður í staði Dávids.

11 Og dagarnir, sum Dávid ríkti yvir Ísrael, *vóru* fjøruti ár: sjey ár ríkti hann í Hĕ´-brŏn, og tríati og trý ár ríkti hann í Jerusalem.

12 ¶ Tá settist Sálomon uppá hásæti Dávids, faðirs síns; og hansara kongadømi varð stórliga grundfest.

13 ¶ Og Ăd-ō-nī´-jăh Hăg´-gĭth-s sonur kom til Băth´-shĕ-bŭ, móður Sálomons. Og hon segði, kemurt tú friðsamliga? Og hann segði, Friðsamliga.

14 Hann segði harafturat, Eg havi eitthvørt at siga við teg. Og hon segði, Sig áfram.

15 Og hann segði, Tú veitst, at kongadømið var mítt, og *at* alt Ísrael settu andlit síni á meg, at eg skuldi ríkja: hvussu enn er, kongadømið er vent íkring, og er vorðið bróðurs míns: tí at tað var hansara frá HARRANUM.

16 Og nú biði eg ēina umbøn av tær, nokta mær ikki. Og hon segði við hann, Sig áfram.

17 Og hann segði, Tala, eg biði teg, við Sálomon kong, (tí hann vil ikki siga tær nei,) at hann gevi mær Á-bī-sjăg, Sjû-năm-mĭt-una, til ektakonu.

18 Og Băth-sjĕ-bă segði, Gott; eg vil tala fyri teg við kong.

19 ¶ Băth-sjĕ-bă tessvegna fór at Sálomon kongi, at tala við hann fyri Ăd-ō-nī-jăh. Og kongur reis upp at møta henni, og boygdi seg at henni, og settist niður á hásæti sítt, og voldi einum sæti at verða settum til kongsmóðurina; og hon settist við høgru hond hansara.

20 So segði hon, Eg trái ēina lítla umbøn av tær; *eg biði teg,* sig mær ikki nei. Og kongur segði við hana, Umbið áfram, móðir mín: tí eg vil ikki siga tær nei.

21 Og hon segði, Lat Á-bī-sjăg, Sjû-năm-mĭt-una, verða givna til Ăd-ō-nī-jăh, bróðurs tíns, til ektakonu.

22 Og Sálomon kongur svaraði og segði við móður sína, Og hví umbiðurt tú Á-bī-sjăg, Sjû-năm-mĭt-una, til Ăd-ō-nī-jăh? umbið til hansara kongadømið eisini; tí at hann *er* eldri bróðir mín; enntá til hansara, og til Ā-bī-ă-thārs prests, og til Jó-ăb-s Zĕr-ū-jŭh sonar.

23 Tá svór Sálomon kongur við HARRAN, sigandi, Guð geri soleiðis við meg, og meira við, um Ăd-ō-nī-jăh havi ikki talað hetta orðið ímóti egna lívi sínum.

24 Nú tessvegna, *sum* HARRIN livir, sum hevur grundfest meg, og sett meg á hásæti Dávids, faðirs míns, og sum hevur gjørt mær eitt hús, eins og hann fyrijáttaði, Ăd-ō-nī-jăh skal verða tikin av lívi henda dag.

25 Og Sálomon kongur sendi við hendi Bĕ-năĭ-ăh Jĕ-hŏĭ-ă-dă sonar; og hann fell uppá hann, at hann doyði.

26 ¶ Og við Ā-bī-ă-thār prest segði kongur, Slepp tær til Án-ā-thōth, at egnu akrum tínum; tí at tú *ert* verdigur til deyða: men eg vil ikki á hesi tíð taka teg av lívi, av tí at tú bart ørk Harrans GUÐS frammi fyri Dávidi, faðir mínum, og av tí at tú hevurt verið nívdur í øllum, hvarí faðir mín var nívdur.

27 So Sálomon stoytti út Ā-bī-ă-thār frá at vera prestur at HARRANUM; at hann mátti uppfylla orðið hjá HARRANUM, sum hann talaði viðvíkjandi húsi Ē-lī-s í Sjĭ-lôh.

28 ¶ Tá komu tíðindir til Jó-ăb-s: tí at Jó-ăb hevði vent eftir Ăd-ō-nī-jăh, hóast hann vendi ikki eftir Ăb-să-lōm-i. Og Jó-ăb flýddi at tabernakli HARRANS, og tók hald á hornum altarsins.

29 Og tað varð sagt Sálomon kongi, at Jó-ăb var flýddur at tabernakli HARRANS; og sí, *hann er* við altarið. Tá sendi Sálomon Bĕ-năĭ-ăh Jĕ-hŏĭ-ă-dă son, sigandi, Far, fall uppá hann.

30 Og Bĕ-năĭ-ăh kom til tabernakkuls HARRANS, og segði við hann, Svá sigur kongur, Kom fram. Og hann segði, Nei; men eg vil doyggja her. Og Bĕ-năĭ-ăh bar kongi orð aftur, sigandi, Svá sigur Jó-ăb, og svá svaraði hann mær.

31 Og kongur segði við hann, Ger sum hann hevur sagt, og fall uppá hann, og jarða hann; at tú mást taka burtur tað sakleysa blóðið, sum Jó-ăb helti, frá mær, og frá húsi faðirs míns.

32 Og HARRIN skal venda aftur

hansara blóð uppá egna høvd hansara, hvør fell uppá tveir menn meiri rættvísir og betri enn hann, og vá teir við svørðinum, faðir mín Dávid ei vitandi *harum, tað vil siga,* Abner Nêrs son, høvuðsmann av herliði Ísraels, og Á-mâ-să Jĕ-thĕr-s son, høvuðsmann av herliði Judah.

33 Teirra blóð skal tí venda aftur uppá høvur Jó-ăb-s, og uppá høvur sáðs hans um ævir: men uppá Dávid, og uppá sáð hans, og uppá hús hans, og uppá hásæti hans, skal tað vera friður um ævir frá HARRANUM.

34 So Bĕ-naî-ăh Jĕ-hôi-ă-dă sonur fór upp, og fell uppá hann, og vá hann: og hann varð jarðaður í egna húsi sínum í oyðuni.

35 ¶ Og kongur setti Bĕ-naî-ăh Jĕ-hôi-ă-dă son í hansara rúm yvir herliðinum: og Zā-dŏk prest setti kongur í rúm Ā-bĭ-ă-thâr-s.

36 ¶ Og kongur sendi og kallaði eftir Sjĭm-ĕ-ī, og segði við hann, Bygg tær eitt hús í Jerusalem, og dvølst har, og far ikki fram haðani nakrasteðs.

37 Tí at tað skal verða, *at* á tí degi *ið* tú fert út, og fert yvirum áarløkin Kĭ-drŏn, skalt tú vita fyri vist, at tú skalt vissuliga doyggja: títt blóð skal vera uppiá egna høvdi tínum.

38 Og Sjĭm-ĕ-ī segði við kong, Framsøgnin *er* góð: eins og harri mín kongur hevur sagt, soleiðis vil tænari tín gera. Og Sjĭm-ĕ-ī dvaldist í Jerusalem mangar dagar.

39 Og tað bar á við endan á trimum árum, at tveir av tænarum Sjĭm-ĕ-ī-s runnu burtur at Á-chĭsj Mā-ă-châh syni, kongi av Gáth. Og teir søgdu Sjĭm-ĕ-ī frá, sigandi, Sí, tænarar tínir *veri* í Gáth.

40 Og Sjĭm-ĕ-ī reistist, og saðlaði asna sín, og fór til Gáth til Á-chĭsj at søkja tænarar sínar: og Sjĭm-ĕ-ī fór, og førdi tænarar sínar frá Gáth.

41 Og tað varð sagt Sálomoni, at Sjĭm-ĕ-ī var farin frá Jerusalem til Gáth, og var komin aftur.

42 Og kongur sendi og rópaði Sjĭm-ĕ-ī, og segði við hann, Fekk eg ikki teg at svørja við HARRAN, og fastsló at tær, sigandi, Vita fyri vissu, á tí degi tú fert út, og gongurt útiumkring nakrasteðs, at tú skalt vissuliga doyggja? og tú segðirt við meg, Tað orð, *sum* eg havi hoyrt, *er* gott.

43 Hví hevurt tú tá ikki hildið HARRANS eið, og áboðið sum eg havi álagt tær við?

44 Kongur segði harafturat til Sjĭm-ĕ-ī-s, Tú veitst alla ta vondsku, sum títt hjarta er loyniligt fyri, sum tú gjørdirt við Dávid, faðir mín: tí skal HARRIN venda aftur vondsku tína uppá egna høvur títt;

45 Og Sálomon kongur *skal vera* vælsignaður, og hásæti Dávids skal vera grundfest frammi fyri HARRANUM um ævir.

46 So kongur ábeyð Bĕ-naî-ăh Jĕ-hôi-ă-dă syni; sum fór út, og fell uppá hann, at hann doyði. Og kongadømið var grundfest í hendi Sálomons.

KAPITUL 3

OG Sálomon gjørdi mágskap við Pharaoh kong av Egyptalandi, og tók dóttur Pharaohs, og førdi hana inn í stað Dávids, inntil hann hevði lokið við at byggja egna hús sítt, og hús HARRANS, og Jerusalems múr runt umkring.

2 Einans fólkið sláturofraði í høgum plássum, av tí at tað var einkið hús bygt navni HARRANS, inntil teir dagarnar.

3 Og Sálomon elskaði HARRAN, gangandi í ásetingum Dávids, faðirs síns: einans hann sláturofraði og brendi roykilsi í høgum plássum.

4 Og kongur fór til Gibeon at sláturofra har; tí at tað *var* tað mikla høga plássið: eitt túsund brennioffur ofraði Sálomon uppiá tí altarinum.

5 ¶ Í Gibeon birtist HARRIN fyri Sálomoni í einum dreymi um nátt*ina:* og Guð segði, Umbið hvat eg skal geva tær.

6 Og Sálomon segði, Tú hevurt sýnt tænara tínum Dávidi, faðir mínum, mikla miskunn, samsvarandi sum hann gekk frammi fyri tær í sannleika, og í rættvísi, og í reiðiligleika av hjarta við tær; og tú hevurt varðveitt til hansara hesa miklu blídni, at tú hevurt givið honum ein son at sita á hásæti hansara, sum *tað er* henda dag.

7 Og nú, O HARRI Guð mín, tú hevurt gjørt tænara tín *til* kong í stað Dávids, faðirs míns: og eg *eri bert* eitt lítið barn: eg veit ikki, *hvussu* fara *eigur* út ella koma inn.

8 Og tín tænari *er* í miðjum fólki tínum, sum tú hevurt valt, eitt mikið fólk, sum ei kann verða upproknað ella talt fyri fjøldleika.

9 Gev tí tænara tínum eitt skiljandi hjarta at døma fólk títt, at eg má greina ímillum gott og ringt: tí at hvør er førur fyri at døma hetta títt so mikla eitt fólk?

10 Og talan toknaði Harranum, at Sálomon hevði umbiðið hetta tingið.

11 Og Guð segði við hann, Av tí at tú hevurt umbiðið hetta tingið, og hevurt ikki umbiðið til tín sjálvs langt lív; eiheldur hevurt umbiðið ríkidømir til tín sjálvs, ella hevurt umbiðið lívið hjá fíggindum tínum; men hevurt umbiðið til tín sjálvs skil til at greina dóm;

12 Sí, eg havi gjørt samsvarandi við orð tíni: sí, eg havi givið tær eitt víst og eitt skiljandi hjarta; so at tað var eingin líka *sum* tú undan tær, eiheldur eftir teg skal nakar rísa líkur tær.

13 Og eg havi eisini givið tær tað sum tú hevurt ikki umbiðið, bæði ríkidømir, og heiður: so at tað skal ikki vera nakar millum kongarnar líkur tær allar dagar tínar.

14 Og um tú vilt ganga í vegum mínum, at halda mínar ásetingar og boðini hjá mær, eins og faðir tín Dávid gekk, tá vil eg leingja dagar tínar.

15 Og Sálomon vaknaði; og sí, *tað var* ein dreymur. Og hann kom til Jerusalem, og stóð frammi fyri ørk sáttmála HARRANS, og ofraði upp brennioffur˘, og ofraði friðoffur˘, og gjørdi eina veitslu fyri øllum tænarum sínum.

16 ¶ Tá komu tað tvær kvinnur, *sum vóru* skøkjur, at kongi, og stóðu frammi fyri honum.

17 Og tann ēina kvinnan segði, O harri mín, eg og henda kvinna dvøljast í ēinum húsi; og eg varð loyst frá einum barni við henni í húsinum.

18 Og tað bar á hin triðja dagin eftir at eg var loyst, at henda kvinnan varð loyst eisini: og vit *vóru* saman; *tað var* eingin fremmandur við okkum í húsinum, uttan vit tvær í húsinum.

19 Og barnið hjá hesi kvinnu doyði um náttina; av tí at hon legðist yvir tað.

20 Og hon reistist á midnátt, og tók son mín frá við síðuna av mær, meðan tænastumoy tín svav, og legði tað í barm sín, og legði sítt deyða barn í barm mín.

21 Og tá ið eg reis um morgunin at geva barni mínum *at* súgva, sí, tað var deytt: men tá ið eg hevði umhugsað tað um morgunin, sí, tað var ikki sonur mín, sum eg føddi.

22 Og hīn kvinnan segði, Nei; men tann livandi *er* sonur mín, og tann deyði *er* sonur tín. Og hendan segði, Nei; men tann

deyði *er* sonur tín, og tann livandi *er* sonur mín. Soleiðis talaðu tær frammi fyri kongi.

23 Tá segði kongur, Tann ēina sigur, Hesin *er* sonur mín sum livir, og sonur tín *er* hin deyði: og hīn sigur, Nei; men sonur tín *er* hin deyði, og sonur mín *er* hin livandi.

24 Og kongur segði, Førið mær eitt svørð. Og teir førdu eitt svørð framfyri kong.

25 Og kongur segði, Skiftið tí livandi barninum í tvent, og gevið helming til ta ēinu, og helming til hīna.

26 Tá talaði tann kvinnan, hvørs tað livandi barnið *var,* við kong, tí hennara innangoymslur stundaðu uppá son sín, og hon segði, O harri mín, gev henni tað livandi barnið, og á ongan vís veg tað. Men hīn segði, Lat tað vera hvørki mítt ella títt, *men* skift *tí.*

27 Tá svaraði kongur og segði, Gevið henni tað livandi barnið, og á ongan vís veg tað: hon *er* móðir tess.

28 Og allur Ísrael hoyrdi um dómin, sum kongur hevði dømt; og tey óttaðust kong: tí at tey sóu, at vísdómur Guðs *var* í honum, til at inna dóm.

KAPITUL 4

SO Sálomon kongur var kongur yvir øllum Ísrael.

2 Og hesir *vóru* prinsarnir sum hann hevði; Â-zăr´-jăh, sonur Zā´-dŏk-s prests,

3 Ē-lĭ-hôr´-ĕph og Á-hĭ-ăh, synir Sjī´-sjă, skrivarar; Jē-hō´-sjâ-phăt Á-hĭ-lŭd-s sonur, skrásetarin.

4 Og Bē-nâ´-ăh Jē-hôi´-ă-dă sonur *var* yvir herliðinum: og Zā´-dŏk og Ā´-bĭ-ă-thâr *vóru* prestarnir:

5 Og Â-zăr´-jăh Náthans sonur *var* yvir yvirmonnunum: og Zā´-bŭd Náthans sonur *var* fremstur yvirmaður, *og* kongsins vinur:

6 Og Á´-hĭ-sjâr *var* yvir húshaldinum: og Ă-dó´-nĭ-răm Abda sonur *var* yvir íkastinum.

7 ¶ Og Sálomon hevði tólv yvirmenn yvir øllum Ísrael, sum skaffaðu vistir til kongs og húshald hans: hvør maður sín mánað í ári inti skaffan.

8 Og hesi *eru* nøvn teirra: Sonur Hūrs, á Ē´-phră-ĭm fjalli:

9 Sonur Dē´-kâr-s, í Má´-kăz, og í Sjā-ăl´-bĭm, og Bĕth´-sjē-mĕsj, og Ē´-lŏn-bĕth-há´-năn:

10 Sonur Hē´-sĕd-s, í Ă-rū´-bōth; til hansara *hoyrdi* Sō´-chōh, og alt land Hē´-phĕr-s:

11 Sonur Ă-bĭn´-ă-dăb-s, í øllum umráði Dōrs; sum hevði Tá´-phăth, dóttur Sálomons, til ektakonu:

12 Bā´-ă-nă Á´-hĭ-lŭd-s sonur; *til hansara hoyrdu* Tā´-ă-năch og Mē-gĭd´-dō, og alt Bĕth-sjĕ´-ăn, sum *er* við Zâr-tá´-năh niðanfyri Jĕz´-rēel, frá Bĕth-sjĕ´-ăn til Á´-bĕl-mē-hó´-lăh, *alt* at *plássinum sum er* handan Jŏk´-nē-ăm:

13 Sonur Gē´-bĕr-s, í Rá´-mŏth-gī´-lē-ăd; til hansara *hoyrdu* býir Já´-ĭr-s Mă-năs´-sēh sonar, sum *eru* í Gilead; til hansara *eisini hoyrdi* umráði Ar´-gŏb-s, sum *er* í Bá´-sjăn, trísinstjúgu miklir staðir við múrum og messing stongum:

14 Ă-hĭn´-ă-dăb Ĭd´-dō-s sonur *hevði* Mă-há´-nă-ĭm:

15 Â-hĭ´-mă-ăz *var* í Năph´-tâ-lī; hann eisini tók Bás´-măth, dóttur Sálomons, til ektakonu:

16 Bā´-ă-năh Hū´-sjâi-s sonur *var* í Ásjer og í Ā´-lōth:

17 Jē-hō´-sjâ-phăt Pá´-rû-ăh sonur í Ĭs´-să-chār:

18 Sjĭm´-ē-ī Ē´-lăh sonur í Benjamin:

19 Gē´-bĕr Ū´-rī-s sonur *var* í landi Gileads, *í* landi Sī´-hŏn-s Amorita kongs, og Ōgs Bá´-sjăn-s kongs; og *hann var* tann ēinasti yvirmaðurin sum *var* í landinum.

20 ¶ Judah og Ísrael *vóru* mangir, eins og sandurin sum *er* við sjógvin í fjøldleika, etandi og drekkandi, og haldandi at gamni.
21 Og Sálomon ríkti yvir øllum kongadømum frá ánni at landi Philistanna, og at marki Egyptalands: teir førdu gávur, og tæntu Sálomoni allar dagar lívs hansara.
22 ¶ Og Sálomons uppihald til ein dag var tríati mál av finum mjøli, og trísinstjúgu mál av mjøli,
23 Tíggju feitir oksar, og tjúgu oksar uttanav beiti*lend*unum, og hundrað seyðir, umframt hjørtir, og rábukkar, og dádýr, og gøddur fuglur.
24 Tí at hann hevði harradømi yvir øllum *umráðinum* hesumegin ánna, frá Tiph´-säh enntá til Azzah, yvir øllum kongunum hesumegin ánna: og hann hevði frið á øllum síðum runt umkring seg.
25 Og Judah og Ísrael dvaldust tryggliga, hvør maður undir víntræi sínum og undir fikutræi sínum, frá Dán enntá til Bēēr´-sjē-bū, allar dagar Sálomons.
26 ¶ Og Sálomon hevði fjøruti túsund stallar av hestum til vagna sína, og tólv túsund hestmenn.
27 Og teir yvirmenninir skaffaðu vistir til Sálomon kongs, og til alra sum komu at borði Sálomon kongs, hvør maður í mánaði sínum: teimum vantaði einkið.
28 Bygg eisini og strá til hestanna og dromedāranna førdu teir at staðnum har *yvirmenninir* vóru, hvør maður samsvarandi við álegging hans.
29 ¶ Og Guð gav Sálomoni vísdóm og skil avbera mikið, og stórsemi av hjarta, enntá sum sandurin sum *er* á sævarstrondini.
30 Og Sálomons vísdómur bar av vísdóminum hjá øllum børnum eysturlandsins, og øllum vísdómi Egyptalands.
31 Tí at hann var vísari enn allir menn; enn Ē´-thăn Ēz-rā-hĭt´-i, og Hē´-măn, og Chăl´-cŏl, og Dâr´-dă, Má´-höl-s synir: og hansara navnfremi var í øllum tjóðum runt umkring.
32 Og hann talaði trý túsund orðtøk: og hansara sangir vóru eitt túsund og fimm.
33 Og hann talaði um trø, frá sedristræinum sum *er* í Lí´-bă-nŏn, alt at ýsopinum sum sprettur út úr múrinum: hann talaði eisini um djór˘, og um fuglar, og um skriðkykt˘, og um fiskar.
34 Og tað komu av øllum fólki at hoyra vísdóm Sálomons, frá øllum kongum jarðarinnar, sum høvdu hoyrt um vísdóm hans.

KAPITUL 5

OG Hiram kongur av Týrus sendi tænarar sínar at Sálomoni; tí at hann hevði hoyrt, at teir høvdu salvað hann *til* kong í rúm faðirs hansara: tí at Hiram var ævir ein elskari av Dávidi.
2 Og Sálomon sendi til Hirams, sigandi,
3 Tú veitst, hvussu ið Dávid, faðir mín, kundi ikki byggja eitt hús at navni HARRANS Guðs síns fyri kríggini, sum vóru um hann á hvørjari síðu, inntil HARRIN setti teir undir iljarnar á fótum hansara.
4 Men nú hevur HARRIN Guð mín givið mær hvíld á hvørjari síðu, *so at tað er* hvørki mótstandari ella illur tilburður.
5 Og sí, eg fyriætli at byggja eitt hús at navni HARRANS Guðs míns, eins og HARRIN talaði við Dávid, faðir mín, sigandi, Sonur tín, hvønn eg vil seta uppá hásæti títt í rúm títt, hann skal byggja eitt hús at navni mínum.
6 Nú tessvegna, ábjóða tú, at teir høggi mær sedristrø úr Lí´-bă-nŏn; og mínir tænarar skulu vera við tænarum tínum: og innat tær

vil eg geva hýru fyri tænarar tínar, samsvarandi við alt sum tú skalt fyriskipa: tí at tú veitst, at *tað er* ikki okkara millum nakar sum kann duga at høgga timbur líkt Sī-dṓ-nī-arunum.

7 ¶ Og tað bar á, tá ið Hiram hoyrdi orðini hjá Sálomoni, at hann fegnaðist mikilligani, og segði, Vælsignaður *veri* HARRIN henda dag, sum hevur givið innat Dávidi ein vísan son yvir hesum mikla fólki.

8 Og Hiram sendi til Sálomons, sigandi, Eg havi umhugsað tann lut, sum tú sendirt til mín um: *og* eg vil gera alla tína trá viðvíkjandi timbri av sedris, og viðvíkjandi timbri av furu.

9 Mínir tænarar skulu koma við *teimum* oman frá Lī´-bă-nŏn at sjónum: og eg vil føra tey eftir sjógvi í flakum at staðnum sum tú skalt áseta mær, og vil elva tey at verða sundurtikin har, og tú skalt móttaka *tey:* og tú skalt fullføra trá mína, í at geva føði til húshald mítt.

10 So Hiram gav Sálomoni sedristrø og furutrø *samsvarandi við* alla trá hansara.

11 Og Sálomon gav Hirami tjúgu túsund mál av hveiti *til* matnað til húshalds hansara, og tjúgu mál av skírari olju: svá gav Sálomon til Hirams ár um ár.

12 Og HARRIN gav Sálomoni vísdóm, eins og hann fyrijáttaði honum: og tað var friður ímillum Hiram og Sálomon; og teir tveir gjørdu eitt bandalag saman.

13 ¶ Og kong Sálomon reisti eina innkalling úr øllum Ísrael; og innkallingin var tríati túsund menn.

14 Og hann sendi teir til Lī´-bă-nŏn, tíggju túsund um mánað*in* eftir skiftum: ein mánað vóru teir í Lī´-bă-nŏn, *og* tveir mánaðir heima við *hús:* og Ă-dṓ´-nī-răm *var* yvir innkallingini.

15 Og Sálomon hevði trísinstjúgu og tíggju túsund sum bóru byrður, og fýrsinstjúgu túsund høggarar í fjøllunum;

16 Umframt teir fremstu av Sálomons yvirmonnum sum *vóru* yvir arbeiðinum, trý túsund og trý hundrað, sum stjórnaðu yvir fólkinum sum arbeiddi í arbeiðinum.

17 Og kongur ábeyð, og teir fórdu miklar steinar, kostnaðarsamar steinar, *og* høgdar steinar, at leggja grundvøll hússins.

18 Og Sálomons byggjarar og Hirams byggjarar høgdu *teir,* og stein-fýrkantararnir: so teir fyrireikaðu timbur og steinar til at byggja húsið.

KAPITUL 6

OG tað bar á í tí fýra hundradasta og áttatiunda árinum eftir at børn Ísraels vóru komnir út úr Egyptalandi, í tí fjórða árinum av ríkjan Sálomons yvir Ísrael, í mánaðinum Zif, sum *er* hin annar mánaðurin, at hann byrjaði at byggja hús HARRANS.

2 Og húsið, sum kong Sálomon bygdi til HARRANS, longdin hará *var* trísinstjúgu alnir, og breiddin hará tjúgu *alnir,* og hæddin hará tríati alnir.

3 Og forhøllin frammanfyri templið av húsinum, tjúgu alnir *var* longdin hará, samsvarandi við breiddina á húsinum; *og* tíggju alnir *var* breiddin hará frammanfyri húsið.

4 Og til húsið gjørdi hann vindeygu av mjáum ljósum.

5 ¶ Og ímóti vegginum av húsinum bygdi hann kømur runt umkring, *ímóti* veggunum av húsinum runt íkring, *bæði* av templinum og av oraklinum: og hann gjørdi kømur runt umkring:

6 Tað niðarligasta kamarið *var* fimm alnir breitt, og tað mittasta *var* seks alnir breitt, og tað triðja

var sjey alnir breitt: tí uttanfyri *í vegginum* av húsinum gjørdi hann smalkaðar stallar runt umkring, at *bjálkarnir* skuldu ei verða festir í veggirnar av húsinum.

7 Og húsið, tá ið tað stóð í bygging, varð bygt úr steini, gjørdum tilreiðar áðrenn hann varð førdur hagar: so at tað varð hvørki hamari ella øks *ella* nakað amboð av jarni hoyrt í húsinum, meðan tað stóð í bygging.

8 Hurðin til tað mittasta kamarið *var* í høgru síðuni av húsinum: og teir fóru upp við snarandi trappum inn í tað mittasta *kamarið,* og úr tí mittasta inn í tað triðja.

9 So hann bygdi húsið, og fullgjørdi tað; og dekkaði húsið við bjálkum og *tilju*borðum av sedris.

10 Og *síðan* bygdi hann kømur ímóti øllum húsinum, fimm alnir høg: og tey hvíldu á húsinum við timbri av sedris.

11 ¶ Og HARRANS orð kom til Sálomons, sigandi,

12 *Viðvíkjandi* hesum húsinum, sum tú ert í *ferð við* at byggja, um tú vilt ganga í ásetingum mínum, og útøva dómar mínar, og halda øll boðini hjá mær at ganga í teimum; tá vil eg útinna orðið hjá mær við tær, hvørt eg talaði við Dávid, faðir tín:

13 Og eg vil dvøljast Ísraels barna millum, og vil ikki yvirgeva fólk mítt Ísrael.

14 So Sálomon bygdi húsið, og fullførdi tað.

15 Og hann bygdi veggirnar av húsinum innan við borðum av sedris, bæði gólvið av húsinum, og veggirnar av loftinum: *og* hann dekkaði *teir* á innsíðuni við viði, og dekkaði gólvið av húsinum við plonkum av furu.

16 Og hann bygdi tjúgu alnir á síðunum av húsinum, bæði gólvið og veggirnar við borðum av sedris: hann enntá bygdi *teir* til tað innan, *enntá* til oraklið, *enntá* til tað mest heilaga *plássið*.

17 Og húsið, tað *er* templið frammanfyri tí, var fjøruti alnir *langt*.

18 Og sedris*viðurin* av húsinum innan *varð* telgdur við knappum og opnum blómum: alt *var* sedris*viður;* tað var eingin steinur sæddur.

19 Og oraklið fyrireikaði hann í húsinum innan, til at seta har ørk sáttmála HARRANS.

20 Og oraklið í frampartinum *var* tjúgu alnir í longd, og tjúgu alnir í breidd, og tjúgu alnir í hæddini hará: og hann yvirklæddi tað við skírum gulli; og *soleiðis* dekkaði altarið, *sum var úr* sedris.

21 So Sálomon yvirklæddi húsið innan við skírum gulli: og hann gjørdi eina avskildring við keturnar av gulli frammanfyri oraklið; og hann yvirklæddi hana við gulli.

22 Og heila húsið yvirklæddi hann við gulli, inntil hann hevði fullført alt húsið: eisini alt altarið, sum *var* við oraklið, yvirklæddi hann við gulli.

23 ¶ Og innan í oraklinum gjørdi hann tveir ch̲êr-û-bĭm´-ar *av* olivintræi, *hvør* tíggju alnir høgur.

24 Og fimm alnir *var* tann ēini vongurin á ch̲erubinum, og fimm alnir hīn vongurin á ch̲erubinum: frá tí ytsta partinum á tí ēina vonginum at tí ytsta partinum á hīnum *vóru* tíggju alnir.

25 Og hīn ch̲eruburin *var* tíggju alnir: báðir ch̲êr-û-bĭm´-arnir *vóru* av ēinum máti og ēinari stødd.

26 Hæddin á tí ēina ch̲erubinum *var* tíggju alnir, og soleiðis *var hon eisini* á hīnum ch̲erubinum.

27 Og hann setti ch̲êr-û-bĭm´-arnar innaní tí innara húsinum: og teir strektu fram veingirnar á ch̲êr-û-bĭm´-unum, so at vongurin á tí ēina nart tann *ēina* veggin, og vongurin á hīnum ch̲erubinum nart hīn veggin; og teirra veingir

nurtu hvør annan í miðjum húsinum.
28 Og hann yvirklæddi chêr-û-bĭm´-arnar við gulli.
29 Og hann telgdi allar veggirnar av húsinum runt umkring við telgdum skurðverkum av chêr-û-bĭm´-um og pálmatrøum og opnum blómum, innan og uttan.
30 Og gólvið av húsinum yvirklæddi hann við gulli, innan og uttan.
31 ¶ Og til inngongdina av oraklinum gjørdi hann hurðar *av* olivintræi: duratræið *og* síðustavirnir *vóru* ein fimtapart *av veggjnum*.
32 Hurðarnar tvær eisini *vóru av* olivintræi; og hann telgdi uppá tær telgingar av chêr-û-bĭm´-um og pálmatrøum og opnum blómum, og yvirklæddi *tær* við gulli, og breiddi gull uppá chêr-û-bĭm´-arnar, og uppá pálmatrøini.
33 Soleiðis eisini gjørdi hann til hurðina av templinum stólpar *av* olivintræi, ein fjórðingspart *av vegginum*.
34 Og tær tvær hurðarnar *vóru av* furutræi: tey tvey bløðini á tí ēinu hurðini *vóru* faldandi, og tey tvey bløðini á hīnari hurðini *vóru* faldandi.
35 Og hann telgdi *hará* chêr-û-bĭm´-ar og pálmatrø og opnar blómur: og dekkaði *tey* við gulli, riggaði uppá tað telgda verkið.
36 ¶ Og hann bygdi tann innara forgarðin við trimum røðum av høgdum steini, og eini rød av sedris bjálkum.
37 ¶ Í tí fjórða árinum varð grundvøllurin av húsi HARRANS lagdur, í mánaðinum Zif:
38 Og í tí ellivta árinum, í mánaðinum Bul, sum *er* hin áttandi mánaðurin, varð húsið fullført út gjøgnum allar partarnar harhjá, og samsvarandi við alt sniðið á tí. Soleiðis var hann sjey ár um *at* byggja tað.

KAPITUL 7

MEN Sálomon bygdi sítt egna hús trettan ár, og hann fullførdi alt sítt hús.
2 ¶ Hann bygdi eisini hús Lī´-bă-nŏn-s skógar; longdin hará *var* eitt hundrað alnir, og breiddin hará fimti alnir, og hæddin á tí tríati alnir, uppiá fýra røðum av sedris súlum, við sedris bjálkum uppiá súlunum.
3 Og *tað var* dekkað við sedris í erva uppiá bjálkunum, sum *lógu* á fjøruti og fimm súlum, fimtan *í* eini rød.
4 Og *tað vóru* vindeygu *í* trimum røðum, og ljós *var* ímóti ljósi *í* trimum stigum.
5 Og allar hurðarnar og stavirnir *vóru* fýrkantaði, við vindeygunum: og ljós *var* ímóti ljósi *í* trimum stigum.
6 ¶ Og hann gjørdi eina forhøll av súlum; longdin hará *var* fimti alnir, og breiddin hará tríati alnir: og forhøllin *var* frammanfyri tær: og *hīnar* súlurnar og tann tjúkki bjálkin *vóru* frammanfyri tær.
7 ¶ Síðan gjørdi hann eina forhøll til hásætið, har hann kundi døma, *enntá* dómsforhøllina: og *hon var* dekkað við sedris*viði* frá ēinari síðu av gólvinum til hīna.
8 ¶ Og hansara hús, har hann dvaldist, *hevði* ein annan forgarð innanfyri forhøllina, *sum* var av tí líka arbeiðinum. Sálomon gjørdi eisini eitt hús til dóttur Pharaohs, hvørja hann hevði tikið *til ektakonu*, líkt hesi forhøllini.
9 Øll hesi *vóru av* kostnaðarsomum steinum, samsvarandi við mátið av høgdum steinum, sagaðir við sagum, innan og uttan, enntá frá grundvøllinum at syllini, og *somuleiðis* á útsíðuni ímóti tí mikla forgarðinum.
10 Og grundvøllurin *var av*

kostnaðarsomum steinum, enntá miklum steinum, steinar á tíggju alnir, og steinar á átta alnir.

11 Og í erva *vóru* kostnaðarsamir steinar, eftir mátunum á høgdum steinum, og sedris*trø*.

12 Og hin mikli forgarðurin rundan um *var* við trimum røðum av høgdum steinum, og eini rød av sedris bjálkum, bæði til hin innara forgarð av húsi HARRANS, og til forhøll hússins.

13 ¶ Og kong Sálomon sendi og heintaði Hiram út úr Týrus.

14 Hann *var* sonur eina einkju av ættargrein Năph´-tâ-lī-s, og faðir hansara *var* ein maður úr Týrus, ein virkari í messing: og hann var fyltur við vísdómi, og skili, og hegnigur at virka øll verk í messing. Og hann kom til Sálomons kongs, og virkaði alt verk hansara.

15 Tí hann stoypti tvær súlur av messing, átjan alna høgar stykkið: og ein linja á tólv alnir kringfór hvørja av teimum íkring.

16 Og hann gjørdi tvey súluhøvd *av* bræddum messingi, til at seta uppá topparnar av súlunum: hæddin á tí ēina súluhøvdinum *var* fimm alnir, og hæddin á hīnum súluhøvdinum *var* fimm alnir:

17 *Og* net˘ av ruttum verki, og snúringar av ketuverki, til súluhøvdini sum *vóru* uppiá toppinum av súlunum; sjey til tað ēina súluhøvdið, og sjey til hītt súluhøvdið.

18 Og hann gjørdi súlurnar, og tvær røðir runt íkring uppiá tí ēina netverkinum, at dekka súluhøvdini, sum *vóru* uppiá toppinum, við granateplum: og soleiðis gjørdi hann til hītt súluhøvdið.

19 Og súluhøvdini, sum *vóru* uppiá toppinum av súlunum, *vóru* av liljuverki í forhøllini, fýra alnir.

20 Og súluhøvdini uppiá teimum tveimum súlunum *høvdu granateplir* eisini í erva, yvir ímóti búkinum sum *var* við netverkið: og granateplini *vóru* tvey hundrað í røðum runt íkring uppiá hīnum súluhøvdinum.

21 Og hann setti upp súlurnar í forhøllini av templinum: og hann setti upp ta høgru súluna, og kallaði navnið hará Já´-chīn: og hann setti upp ta vinstru súluna, og kallaði navnið hará Bó´-ăz.

22 Og uppiá toppinum av súlunum *var* liljuverk: soleiðis varð verkið av súlunum fullført.

23 ¶ Og hann gjørdi ein bræddan sjógv, tíggju alnir frá tí ēina kantinum til hīn: *hann var* rundur alt íkring, og hædd hansara *var* fimm alnir: og ein linja á tríati alnir kringfór hann runt íkring.

24 Og undir kantinum á honum runt íkring *vóru tað* knappar, kringfarandi hann, tíggju í eini alin, kringfarandi sjógvin runt íkring: knapparnir *vórðu* stoyptir í tveimum røðum, tá ið hann varð stoyptur.

25 Hann stóð uppiá tólv oksum, tríggir lítandi ímóti norðan, og tríggir lítandi ímóti vestan, og tríggir lítandi ímóti sunnan, og tríggir lítandi ímóti eystan: og sjógvurin *varð settur* uppiyvir uppá teir, og allir teirra aftaru partar *vóru* inneftir.

26 Og hann *var* eina handarbreidd tjúkkur, og kanturin hará var virkaður líka *sum* kanturin á einum bikari, við blómum av liljum: hann innihelt tvey túsund bāth.

27 ¶ Og hann gjørdi tíggju undirstøður av messing; fýra alnir *var* longdin á ēinari undirstøðu, og fýra alnir breiddin hará, og tríggjar alnir hæddin á henni.

28 Og verkið av undirstøðunum *var* á henda *hátt:* tær høvdu rendur, og rendurnar *vóru* ímillum rammulistarnar:

29 Og á rondunum, sum *vóru* ímillum rammulistarnar, *vóru* leyvur, oksar, og chêr-û-bĭm´-ar: og uppiá rammulistunum *var* ein undirstøða omanfyri: og niðanfyri leyvurnar og oksarnar *vórðu* ávís ískoytir gjørd av tunnum verki.

30 Og hvør undirstøða hevði fýra messing hjól, og plátur av messing: og tey fýra hjørnini hará høvdu fótstykkir: undir tváttarkerinum *vóru* fótstykkir brædd, við síðuna av hvørjum ískoyti.

31 Og munnin á tí, innanfyri súluhøvdið og omanfyri, *var* eina alin: men munnin hará *var* rundur *eftir* verkinum á undirstøðuni, eina alin og eina hálva: og eisini uppiá munnanum á tí *vóru* ristingar við rondum sínum, fýrkantaðar, ikki rundar.

32 Og undir rondunum *vóru* fýra hjól; og akslabitarnir á hjólunum *vóru sambundnir* til undirstøðuna: og hæddin á einum hjóli *var* ein alin og ein hálv alin.

33 Og verkið av hjólunum *var* líka *sum* verkið av einum vagn hjóli: teirra akslabitar, og teirra hjørtu, og teirra felgur, og teirra snældur, *vóru* øll brædd.

34 Og *tað vóru* fýra fótstykkir til tey fýra hjørnini av ēinari undirstøðu: *og* fótstykkini *vóru* av sjálvastu undirstøðuni sjálvari.

35 Og í toppinum av undirstøðuni *var tað* ein rund gjørð á hálva alin høg: og á toppinum av undirstøðuni *vóru* rammulistarnir hjá tí og rendurnar hjá tí úr tí sama.

36 Tí á pláturnar av rammulistunum á tí, og á rendurnar á tí, ristí hann chêr-û-bĭm´-ar, leyvur, og pálmatrø, samsvarandi við lutfallið á hvørjum *og* ēinum, og ískoytir runt umkring.

37 Eftir hesum *háttarlagi* gjørdi hann tær tíggju undirstøðurnar: allar av teimum høvdu ēina stoyping, ēitt mát, *og* ēina støddi.

38 ¶ Síðan gjørdi hann tíggju ker av messing: ēitt ker innihelt fjøruti báth: *og* hvørt ker var fýra alnir: *og* uppiá hvørjum *og* ēinum av teimum tíggju undirstøðunum ēitt ker.

39 Og hann setti fimm undirstøður á ta høgru síðuna av húsinum, og fimm á ta vinstru síðuna av húsinum: og hann setti sjógvin á ta høgru síðuna av húsinum eystanvert yvir ímóti sunnan.

40 ¶ Og Hiram gjørdi kerini, og skuplurnar, og kørini. So Hiram gjørdi enda á at gera alt verkið sum hann gjørdi Sálomon kongi til hús HARRANS:

41 Tær tvær súlurnar, og tær *tvær* skálirnar av súluhøvdunum sum *vóru* á toppinum av teimum tveimum súlunum; og tey tvey netverkini, til at dekka tær tvær skálirnar av súluhøvdunum sum *vóru* uppiá toppinum á súlunum;

42 Og fýra hundrað granateplir til tey tvey netverkini, *enntá* tvær røðir av granateplum til ēitt netverk, at dekka tær tvær skálirnar av súluhøvdunum sum *vóru* uppiá súlunum;

43 Og tær tíggju undirstøðurnar, og *tey* tíggju kerini á undirstøðurnar;

44 Og ēin sjógv, og tólv oksar undir sjógvin;

45 Og grýturnar, og skuplurnar, og undirstøðurnar: og øll hesi reiðini, sum Hiram gjørdi til Sálomon kongs til hús HARRANS, *vóru av* bjørtum messing.

46 Í Jordans-slættanum stoypti kongur tey, í leirlendinum ímillum Sŭc´-cōth og Zâr´-thăn.

47 Og Sálomon eftirlæt øll reiðini *óvigaði*, av tí at tey vóru avbera mong: eiheldur varð vektin á messinginum funnin útav.

48 Og Sálomon gjørdi øll reiðini sum *tilhoyrdu* húsi HARRANS: altarið av gulli, og borðið av gulli, hvaruppiá sýnisbreyðið *var,*

49 Og ljósastakarnar av skírum gulli, fimm á teirri høgru *síðuni,* og fimm á teirri vinstru, frammanfyri oraklið, við blómunum, og lompunum, og *veik*tongunum *av* gulli,

50 Og skálirnar, og ljósasaksarnar, og kørini, og sleivirnar, og roykilsis-pannurnar *av* skírum gulli; og hongslini *av* gulli, *bæði* til hurðarnar av tí innara húsinum, tí mest heilaga *plássinum, og* til hurðarnar av húsinum, *tað vil siga,* av templinum.

51 Soleiðis varð endað alt verkið sum Sálomon kongur gjørdi til hús HARRANS. Og Sálomon førdi inn tingini sum Dávid, faðir hansara, hevði innvígað; *enntá* silvurið, og gullið, og íløtini, setti hann millum dýrgripa HARRANS húss.

KAPITUL 8

TÁ samansavnaði Sálomon teir elstu av Ísrael, og øll høvd ættargreinanna, hinar fremstu av fedrum Ísraels barna, at Sálomon kongi í Jerusalem, at teir máttu føra upp ørk sáttmála HARRANS út úr staði Dávids, sum *er* Zion.

2 Og allir menninir av Ísrael flykkjaðu seg at Sálomon kongi við hátíðina í mánaðinum Ēth′-ānim, sum *er* sjeyndi mánaðurin.

3 Og allir teir elstu av Ísrael komu, og prestarnir tóku upp ørkina.

4 Og teir førdu niðan ørk HARRANS, og samkomu-tabernaklið, og øll tey heilagu reiðini sum *vóru* í tabernaklinum, enntá tey bóru prestarnir og Levitarnir niðan.

5 Og Sálomon kongur, og øll samkoma Ísraels sum vóru flykkjaðir at honum, *vóru* við honum frammanfyri ørkini, sláturofrandi seyð og oksar, sum kundu ikki verða tald, ella upproknað, fyri fjøldleika.

6 Og prestarnir førdu inn ørk sáttmála HARRANS at plássi hans, inn í orakkul hússins, til tað mest heilaga *plássið, enntá* undir vengur chêr-û-bĭm′-anna.

7 Tí at chêr-û-bĭm′-arnir breiddu fram *sínar* tveir veingir yvir pláss arkarinnar, og chêr-û-bĭm′-arnir dekkaðu ørkina og stavirnar hjá henni uppiyvir.

8 Og teir drógu út stengurnar, at endarnir av stongunum sóust úti í tí heilaga *plássinum* frammanfyri oraklið, og teir sóust ikki uttanfyri: og har eru tær at hesum degi.

9 *Tað var* einkið í ørkini uttan tær tvær talvurnar av steini, sum Móses setti har við Hór′-ēb, tá ið HARRIN gjørdi *ein sáttmála* við børn Ísraels, tá ið teir komu út úr Egyptalandi.

10 Og tað bar á, tá ið prestarnir vóru komnir út úr tí heilaga *plássinum,* at skýggið fylti hús HARRANS,

11 So at prestarnir fingu ikki staðið til at tæna uppá grund av skýgginum: tí at dýrd HARRANS hevði fylt hús HARRANS.

12 ¶ Tá talaði Sálomon, HARRIN segði, at hann vildi búgva í tí tjúkka myrkrinum.

13 Eg havi vissuliga bygt tær eitt hús at búgva í, eitt grundfest pláss til tín at vera í um ævir.

14 Og kongur vendi andliti sínum íkring, og vælsignaði alla samkomu Ísraels: (og øll samkoma Ísraels stóð;)

15 Og hann segði, Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Ísraels, sum talaði við munni sínum við Dávid, faðir mín, og hevur við hond síni uppfylt *tað,* sigandi,

16 Síðan tann dag sum eg førdi fram fólk mítt Ísrael út úr Egyptalandi, valdi eg ongan stað burtur úr øllum ættargreinum Ísraels til at byggja eitt hús, at mítt navn mátti vera harí; men

eg valdi Dávid til at vera yvir fólki mínum Ísrael.

17 Og tað var í hjarta Dávids, faðirs míns, at byggja eitt hús til navns HARRANS Guðs Ísraels.

18 Og HARRIN segði við Dávid, faðir mín, Eftirsum *at* tað var í hjarta tínum at byggja eitt hús at navni mínum, gjørdirt tú væl at tað var í hjarta tínum.

19 Hóast hetta, tú skalt ikki byggja húsið; men sonur tín, sum skal koma fram út úr lendum tínum, hann skal byggja húsið at navni mínum.

20 Og HARRIN hevur útint sítt orð sum hann talaði, og eg eri risin upp í rúm Dávids, faðirs míns, og siti á hásæti Ísraels, eins og HARRIN fyrijáttaði, og havi bygt eitt hús til navn HARRANS Guðs Ísraels.

21 Og eg havi sett har eitt pláss til ørkina, hvarí *er* sáttmáli HARRANS, sum hann gjørdi við fedrar várar, tá ið hann førdi teir upp út úr Egyptalandi.

22 ¶ Og Sálomon stóð frammi fyri altari HARRANS í hjáveruni av allari samkomu Ísraels, og breiddi fram sínar hendur mótvegis himni:

23 Og hann segði, HARRI Guð Ísraels, *tað er* eingin Guð líka *sum* tú, í himni fyri oman, ella á jørð fyri niðan, hvør heldurt sáttmála og miskunn hjá tænarum tínum, sum ganga frammi fyri tær við øllum hjarta sínum:

24 Hvør hevurt hildið hjá tænara tínum Dávidi, faðir mínum, tað *sum* tú lovaðirt honum: tú talaðirt eisini við munni tínum, og hevurt uppfylt *tað* við hond tíni, sum *tað er* henda dag.

25 Tessvegna nú, HARRI Guð Ísraels, halt hjá tænara tínum Dávidi, faðir mínum, tað *sum* tú lovaðirt honum, sigandi, Tað skal ikki svitast tær ein mann í eygsjón míni at sita á hásæti Ísraels; so at børn tíni gevi gætur eftir vegi sínum, at teir gangi frammi fyri mær, eins og tú hevurt gingið frammi fyri mær.

26 Og nú, O Guð Ísraels, lat orð títt, eg biði teg, verða sannað, sum tú talaðirt við tænara tín Dávid, faðir mín.

27 Men vil Guð veruliga dvøljast á jørðini? sí, himinin og himin av himnum kann ikki innihalda teg; hvør mikið minni hetta hús, sum eg havi bygt?

28 Tó havi tú fyrilit yvirfyri bøn tænara tíns, og til umbøning hans, O HARRI Guð mín, at geva gætur at rópinum og eftir bønini, sum tænari tín biður frammi fyri tær í dag:

29 At tíni eygu mega vera opin mótvegis hesum húsi nátt og dag, *enntá* mótvegis plássinum, um hvørt tú hevurt sagt, Mítt navn skal vera har: at tú mást geva gætur at bønini, sum tín tænari skal gera mótvegis hesum plássi.

30 Og gevi tú gætur eftir umbøning tænara tíns, og fólks tíns Ísraels, tá ið teir skulu biðja mótvegis hesum plássi: og hoyri tú í himni tínum bústaði: og tá ið tú hoyrirt, fyrigev.

31 ¶ Um nakar maður misbróti ímóti næsta sínum, og ein eiður verði lagdur uppá hann til at volda honum at svørja, og eiðurin komi framfyri títt altar í hesum húsi:

32 Tá hoyri tú í himni, og geri, og døm tænarar tínar, fordømandi hin vonda, til at føra hansara veg uppá høvur hans; og rættvísgerandi hin rættvísa, til at geva honum samsvarandi við rættvísi hans.

33 ¶ Tá ið fólk títt Ísrael verði sligið niður frammi fyri figgindanum, av tí at teir hava syndað ímóti tær, og skulu venda aftur til tín, og játta navn títt, og biðja, og gera umbøning at tær í hesum húsi:

34 Tá hoyri tú í himni, og fyrigev synd fólks tíns Ísraels, og før teir aftur at landinum sum tú gavst teirra fedrum.

35 ¶ Tá ið himin er lokaður aftur, og tað er einkið regn, av tí at teir hava syndað ímóti tær; um teir biðji mótvegis hesum plássi, og játti navn títt, og vendi frá synd síni, tá ið tú nívirt teir:

36 Tá hoyri tú í himni, og fyrigev synd tænara tína, og fólks tíns Ísraels, at tú læri teir hin góða veg, hvarí teir skuldu ganga, og gevi regn uppá land títt, sum tú hevurt givið til fólks tíns til arvs.

37 ¶ Um tað veri í landinum hungursneyð, um har veri drepsótt, svartaroði, gulnan, grashoppa, *ella* um har veri kálormur; um teirra figgindi kringseti teir í landi staða teirra; hvørsumhelst plága, hvørsumhelst sjúka *har veri seg;*

38 Hvør bøn og umbøning sumhelst, *ið* verði *gjørd* av nøkrum manni, *ella* av øllum fólki tínum Ísrael, sum skulu vita hvør maður pláguna hjá egna hjarta sínum, og breiði fram sínar hendur mótvegis hesum húsi:

39 Tá hoyri tú í himni tínum bústaði, og fyrigev, og ger, og gev til hvørs mans samsvarandi við vegir hans, hvørs hjarta tú kennirt; (tí at tú, *enntá* tú einans, kennirt hjørtuni á øllum børnum manna;)

40 At teir mega óttast teg allar dagarnar sum teir liva í landinum, sum tú gavst fedrum okkara.

41 Harafturat, viðvíkjandi einum fremmandum, sum *er* ikki av fólki tínum Ísrael, men kemur úr einum fjarløgdum landi fyri skuld navns tíns;

42 (Tí at teir skulu hoyra um mikla navn títt, og um tína sterku hond, og um tín útrætta arm;) tá ið hann skal koma og biðja mótvegis hesum húsi;

43 Hoyri tú í himni tínum bústaði, og ger samsvarandi við alt sum hin fremmandi kallar til tín um: at øll fólk jarðarinnar mega kenna navn títt, at óttast teg, eins og *gera* fólk títt Ísrael; og at teir mega vita, at hetta hús, sum eg havi bygt, er kallað við navni tínum.

44 ¶ Um títt fólk fari út til orrustu ímóti fíggindа sínum, hvagarsumhelst tú skalt senda teir, og skulu biðja at HARRANUM mótvegis staðinum sum tú hevurt útvalt, og *mótvegis* húsinum sum eg havi bygt til navns tíns:

45 Tá hoyri tú í himni teirra bøn og teirra umbøning, og handhevji søk teirra.

46 Um teir syndi ímót tær, (tí at *tað er* eingin maður, sum syndar ikki,) og tú verði firtin við teir, og flýggi teir til fíggindans, so at teir beri teir burt *til* fangar at landi fíggindans, fjar ella nær;

47 *Tó* um teir skulu umhugsa seg í landinum, hvagar teir vórðu bornir *til* fangar, og venda um, og gera umbøning at tær í landi teirra sum bóru teir *til* fangar, sigandi, Vit hava syndað, og hava gjørt spilluliga, vit hava framt vondsku;

48 Og *so* koma aftur at tær við øllum hjarta sínum, og við allari sál síni, í landinum hjá sínum fíggindum, sum leiddu teir burtur *til* fanga, og biðji at tær mótvegis landi sínum, sum tú gavst teirra fedrum, staðinum sum tú hevurt valt, og húsinum sum eg havi bygt til navns tíns:

49 Tá hoyri tú teirra bøn og teirra umbøning í himni tínum bústaði, og handhevji søk teirra,

50 Og fyrigev fólki tínum, sum hava syndað ímót tær, og øll teirra misbrot, í hvørjum teir hava misbrotist ímót tær, og gev teimum várkunn frammi fyri teimum sum bóru teir *til* fanga, at teir mega hava várkunn á teir:

51 Tí at teir *veri* fólk títt, og tín arvur, sum tú førdirt fram út úr Egyptalandi, frá miðjum jarn bræðsluovninum:

52 At tíni eygu mega vera opin at umbøning tænara tíns, og at umbøning fólks tíns Ísraels, at geva gætur at teimum í øllum sum teir kalla um at tær.

53 Tí at tú atskildirt teir burtur úr øllum fólkum jarðarinnar, *at vera* tín arvur, sum tú talaðirt við hendi Móse, tænara tíns, tá ið tú førdirt okkara fedrar út úr Egyptalandi, O Harri GUÐ.

54 Og tað varð *soleiðis,* at tá ið Sálomon hevði lokið við at biðja alla hesa bøn og umbøning at HARRANUM, reistist hann frá frammanfyri altari HARRANS, frá at knela á knø síni við hondum sínum breiddum upp til himins.

55 Og hann stóð, og vælsignaði alla samkomu Ísraels við harðari rødd, sigandi,

56 Vælsignaður *veri* HARRIN, sum hevur givið hvíld at fólki sínum Ísrael, samsvarandi við alt sum hann fyrijáttaði: tað hevur ikki svitast ein ítt orð av allari hansara góðu fyrijáttan, sum hann fyrijáttaði við hendi Móse, tænara síns.

57 HARRIN vár Guð veri við oss, eins og hann var við fedrum várum: lat hann ei fara frá okkum, ella yvirgeva okkum:

58 At hann má benda vári hjørtu at sær, at ganga í øllum vegum hans, og at halda boðini hjá honum, og ásetingar hansara, og dómar hans, sum hann ábeyð fedrum várum.

59 Og lat hesi orð míni, við hvørjum eg havi gjørt umbøning frammi fyri HARRANUM, vera nær at HARRANUM Guði várum dag og nátt, at hann handhevji søk tænara síns, og søk fólks síns Ísraels, til allar tíðir, eins og málið skal krevja:

60 At øll fólk jarðarinnar mega vita, at HARRIN *er* Guð, *og at tað er* eingin annar.

61 Latið hjarta tykkara tí vera fullkomið hjá HARRANUM Guði várum, at ganga í ásetingum hans, og at halda boðini hjá honum, sum á hesum degi.

62 ¶ Og kongur, og allur Ísrael við honum, ofraðu sláturoffur frammi fyri HARRANUM.

63 Og Sálomon ofraði eitt sláturoffur av friðofrum, sum hann ofraði at HARRANUM, tvey og tjúgu túsund oksar, og eitt hundrað og tjúgu túsund seyðir. So kongur og øll børn Ísraels innvígaðu hús HARRANS.

64 Hin sama dagin halgaði kongur miðjan forgarðin, sum *var* frammanfyri hús HARRANS: tí at har ofraði hann brennioffur, og matoffur, og feittið av friðofrunum: av tí at messing altarið, sum *var* frammi fyri HARRANUM, *var* ov lítið at taka við brenniofrunum, og matofr*un*um, og feittinum av friðofrunum.

65 Og Sálomon á teirri tíð helt eina veitslu, og alt Ísrael við honum, ein mikil samkoma, frá innfaringini inn av Há-máth *alt* at Egyptalands ánni, frammi fyri HARRANUM Guði várum, sjey dagar og sjey dagar, *enntá* fjúrtan dagar.

66 Á tí áttanda deginum sendi hann fólkið avstað: og teir vælsignaðu kong, og fóru at tjøldum sínum, frødligir og glaðir av hjarta fyri alla ta góðsku sum HARRIN hevði gjørt fyri Dávid sín tænara, og fyri Ísrael sítt fólk.

KAPITUL 9

OG tað bar á, tá ið Sálomon hevði fullført byggingina av húsi HARRANS, og kongshúsinum, og alla Sálomons trá sum honum toknaðist at gera,

2 At HARRIN birtist fyri Sálomoni

aðru ferðina, eins og hann hevði birtst at honum í Gibeon.

3 Og HARRIN segði við hann,
Eg havi hoyrt tína bøn og tína umbøning, sum tú hevurt gjørt frammi fyri mær: eg havi halgað hetta hús, sum tú hevurt bygt, at seta navn mítt har um ævir; og míni eygu og mítt hjarta skulu vera har viðvarandi.

4 Og um tú vilt ganga frammi fyri mær, eins og Dávid, faðir tín, gekk, í heilleika av hjarta, og í reiðiligleika, til at gera samsvarandi við alt sum eg havi áboðið tær, *og* vilt halda mínar ásetingar og mínar dómar:

5 Tá vil eg grundfesta hásæti kongadømis tíns uppiá Ísrael um ævir, eins og eg fyrijáttaði fyri Dávidi, faðir tínum, sigandi, Tað skal ikki svitast tær ein mann uppiá hásæti Ísraels.

6 *Men* um tit skulu yvirhøvur venda frá at fylgja mær, tit ella børn tykkara, og vilji ikki halda míni boð *og* mínar ásetingar, sum eg havi sett frammanfyri tykkum, men fara og tæna øðrum gudum, og tilbiðja teir:

7 Tá vil eg skera av Ísrael burtur úr landinum sum eg havi givið teimum; og hetta hús, sum eg havi halgað til navn mítt, vil eg kasta út úr eygsjón míni; og Ísrael skal vera eitt orðtak og eitt speiorð millum alt fólk:

8 Og við hetta hús, *sum* er høgt, skal hvør tann, sum fer framvið tí, ógvast, og skal físa; og teir skulu siga, Hví hevur HARRIN gjørt soleiðis at hesum landi, og við hetta hús?

9 Og teir skulu svara, Av tí at teir yvirgóvu HARRAN sín Guð, sum førdi fram teirra fedrar út úr Egyptalandi, og hava tikið hald uppá aðrar gudar, og hava tilbiðið teir, og tænt teimum: tí hevur HARRIN ført uppá teir alt hetta illa.

10 ¶ Og tað bar á við endan á tjúgu árum, tá ið Sálomon hevði bygt tey tvey húsini, hús HARRANS, og kongshúsið,

11 (*Nú,* Hiram, kongurin av Týrus, hevði útgjørt Sálomon við sedristrøum og furutrøum, og við gulli, samsvarandi við alla trá hansara,) at Sálomon kongur tá gav Hirami tjúgu staðir í Galilēu landi.

12 Og Hiram kom út frá Týrus at síggja staðirnar sum Sálomon hevði givið honum; og teir toknaðust honum ikki.

13 Og hann segði, Hvørjir staðir *eru* hesir sum tú hevurt givið mær, bróðir mín? Og hann kallaði teir land Cā′-bûl-s at hesum degi.

14 Og Hiram sendi til kongs seksinstjúgu talentir av gulli.

15 ¶ Og henda *er* grundin til innkallingina sum Sálomon kongur reisti; fyri at byggja hús HARRANS, og sítt egna hús, og Mĭl′-lō, og Jerusalems múr, og Hā′-zôr, og Mĕ-gĭd′-dō, og Gē′-zĕr.

16 *Tí at* Pharaoh kongur av Egyptalandi var farin upp, og *hevði* tikið Gē′-zĕr, og brent hann við eldi, og vigið Cānaanitarnar, sum dvaldust í staðinum, og givið hann *til* eina gávu at dóttur síni, ektakonu Sálomons.

17 Og Sálomon bygdi Gē′-zĕr, og Bĕth-hór′-ŏn hitt niðara,

18 Og Bā′-ă-lăth, og Tăd′-môr í oyðuni, í landinum,

19 Og allar goymslu-staðirnar sum Sálomon hevði, og staðir til vagna sína, og staðir til hestmanna sína, og tað sum Sálomon tráaði at byggja í Jerusalem, og í Lĭ′-bă-nŏn, og í øllum landi harradømis síns.

20 *Og* alt fólkið *sum vóru* eftir av Amoritunum, Hittitunum, Pĕ-rĭz-zĭt′-unum, Hī-vīt′-unum, og Jĕb-ū-sīt′-unum, sum *vóru* ikki av børnum Ísraels,

21 Teirra børn, sum vóru eftir eftir teimum í landinum, hvørjar børn Ísraels eisini vóru ikki førir fyri fullkomiligani at oyða, uppá teir innkallaði Sálomon eitt íkast av træltænastu at hesum degi.

22 Men av børnum Ísraels gjørdi Sálomon eingi trælmenni: men teir *vóru* krígsmenn, og tænarar hansara, og prinsar hansara, og høvuðsmenn hansara, og stjórnarar av vagnum hansara, og hestmenn hansara.

23 Hesir *vóru* teir fremstu av høvuðsmonnunum sum *vóru* yvir arbeiði Sálomons, fimm hundrað og fimti, sum bóru stjórn yvir fólkinum sum arbeiddi í arbeiðinum.

24 ¶ Men dóttir Pharaohs kom upp út úr staði Dávids at sínum húsi sum *Sálomon* hevði bygt til hennara: tá bygdi hann Míl´-lō.

25 ¶ Og triggjar ferðir í ári ofraði Sálomon brennioffurˇ og friðoffurˇ uppiá altarinum sum hann bygdi at HARRANUM, og hann brendi roykilsi uppiá altarinum sum *var* frammi fyri HARRANUM. Soleiðis fullførdi hann húsið.

26 ¶ Og kong Sálomon gjørdi ein flota av skipum í Ē´-zī-ōn-gē´-bĕr, sum *er* við síðuna av Ē´-lōth, á strond Reyða-havsins, í landi Ē´-dóm-s.

27 Og Hiram sendi í flotan tænarar sínar; skipsmenn, sum høvdu kunnleika til sævarins, við tænarum Sálomons.

28 Og teir komu til Ō´-phīr, og heintaðu haðani frá gull, fýra hundrað og tjúgu talentir, og komu við *tí* til Sálomon kongs.

KAPITUL 10

OG tá ið drotningin av Sjē´-bá hoyrdi um navngitni Sálomons viðvíkjandi navni HARRANS, kom hon at royna hann við torførum spurningum.

2 Og hon kom til Jerusalem við einum sera miklum riðili, við kamelum sum bóru kryddurtir, og sera nógv gull, og dýrabærar steinar: og tá ið hon var komin til Sálomons, samtalaði hon við hann um alt sum var í hjarta hennara.

3 Og Sálomon segði henni allar spurningar hennara: tað var ikki *nakað* ting fjalt frá kongi, sum hann segði henni ikki.

4 Og tá ið drotningin av Sjē´-bá hevði sæð allan vísdóm Sálomons, og húsið sum hann hevði bygt,

5 Og mat borðs hansara, og sitingina hjá tænarum hansara, og umvartingina hjá hjálparfólkum hansara, og teirra skartaklædnað, og hansara steypberar, og hansara uppstíging, eftir hvørji hann fór upp at húsi HARRANS; var ikki meira andi í henni.

6 Og hon segði til kongsins, Tað var ein sonn frágreiðing, sum eg hoyrdi í egna landi mínum um gerningar tínar og um vísdóm tín.

7 Hóast hetta, eg trúði ikki orðunum, inntil eg kom, og eygu míni høvdu sæð *tað:* og sí, helmingurin varð ikki sagdur mær: tín vísdómur og framgongd ber av tí navngitinum sum eg hoyrdi.

8 Fegnir *eru* menn tínir, fegnir *eru* hesir tænarar tínir, sum standa støðugt frammi fyri tær, *og* sum hoyra vísdóm tín.

9 Vælsignaður veri HARRIN Guð tín, sum fragdaðist í tær, at seta teg á hásæti Ísraels: av tí at HARRIN elskaði Ísrael um ævir, tí gjørdi hann teg *til* kong, at inna dóm og rættlæti.

10 Og hon gav kongi hundrað og tjúgu talentir av gulli, og av kryddurtum sera mikla goymslu, og dýrabærar steinar: tað kom ei meira slíkur ríkiligleiki av kryddurtum sum hesar, sum

drotningin av Sjē´-bă gav til Sálomon kongs.

11 Og flotin eisini hjá Hirami, sum førdi gull frá Ō´-phĭr, førdi inn frá Ō´-phĭr miklan ríkiligleika av ăl´-mŭg trøum, og dýrabærum steinum.

12 Og kongur gjørdi úr ăl´-mŭg trøunum súlur til hús HARRANS, og til hús kongsins, hørpur eisini og psaltrar til sangarar: tað komu eingi slík ăl´-mŭg trø, ella vórðu sædd at hesum degi.

13 Og Sálomon kongur gav drotningini av Sjē´-bă alla hennara trá, hvatsumhelst hon umbað, umframt *tað* sum Sálomon gav henni av síni kongligu stórtøkni. So hon vendi og fór til egna lands síns, hon og tænarar hennara.

14 ¶ Nú, vektin á gulli, sum kom til Sálomons í ēinum ári, var seks hundrað *og* trísinstjúgu og seks talentir av gulli,

15 Umframt *tað sum hann hevði* frá handilsmonnunum, og frá handlingini hjá kryddurtar-handilsmonnunum, og frá øllum kongunum av Arabiu, og frá landsstjórum landsins.

16 ¶ Og kong Sálomon gjørdi tvey hundrað smáskildir *av* slignum gulli: seks hundrað *sjē´-kl-ar* av gulli fóru til ēin smáskjøldur.

17 Og *hann gjørdi* trý hundrað skildir *av* slignum gulli; trý pund av gulli fóru til ēin skjøldur: og kongur setti teir í skógarhús Lī´-bă-nŏn-s.

18 ¶ Harafturat gjørdi kongur eitt mikið hásæti av fílabeini, og yvirklæddi tað við tí besta gullinum.

19 Hásætið hevði seks trin, og toppurin av hásætinum *var* rundur aftantil: og *tað vóru* stuðlar hvørjumegin á plássi sætisins, og tvær leyvur stóðu við síðuna av stuðlunum.

20 Og tólv leyvur stóðu tað á tí ēinu síðuni og á hīnari uppiá teimum seks trinunum: tað varð ikki tílíkt gjørt í nøkrum kongadømi.

21 ¶ Og øll drekki-kerini hjá Sálomon kongi *vóru av* gulli, og øll kerini av skógarhúsi Lī´-bă-nŏn-s *vóru av* skírum gulli; eingi *vóru av* silvuri: tað varð einkið roknað um á døgum Sálomons.

22 Tí at kongur hevði á sjógvi ein Thâr´-sjĭsj-flota við flotanum hjá Hirami: ēinaferð í trý ár kom Thâr´-sjĭsj-flotin, berandi gull, og silvur, fílabein, og apur, og páfuglar.

23 So Sálomon kongur framumgekk allar kongar jarðarinnar í ríkdómum og í vísdómi.

24 ¶ Og øll jørðin leitaði til Sálomons, at hoyra hansara vísdóm, sum Guð hevði lagt í hjarta hansara.

25 Og teir bóru hvør maður sína gávu, reiðir úr silvuri, og reiðir úr gulli, og klæðir, og herbúnað, og kryddurtir, hestar, og múldjór, ein sats ár um ár.

26 ¶ Og Sálomon savnaði saman vagnar og hestmenn: og hann hevði eitt túsund og fýra hundrað vagnar, og tólv túsund hestmenn, hvørjar hann kom fyri í staðunum til vagnar, og hjá kongi í Jerusalem.

27 Og kongur fekk silvur *at vera* í Jerusalem sum steinar, og sedris*trø* fekk hann *at vera* sum morberjatrøini, sum *eru* í láglendinum, í ríkiligleika.

28 ¶ Og Sálomon fekk hestar førdar út úr Egyptalandi, og lín garn: handilsmenn kongs fingu lín garnið til ein prís.

29 Og ein vagnur kom upp og fór út úr Egyptalandi fyri seks hundrað *sjē´-kl-ar* av silvuri, og ein hestur fyri eitt hundrað og fimti: og soleiðis til alra konganna av Hittitunum, og til konganna av Sýriu, førdu teir *teir* út eftir brøgdum sínum.

KAPITUL 11

MEN Sálomon kongur elskaði mangar fremmandar kvinnur, tilsaman við dóttur Pharaohs, kvinnur av Móabitunum, Ammonitunum, Êdómítʼunum, Zîdõʼnĭarunum, *og* Hittitunum;

2 Av tjóðunum, *viðvíkjandi* hvørjum HARRIN segði við børn Ísraels, Tit skulu ikki fara inn til teirra, eiheldur skulu tær koma inn at tykkum: *tí at* vissuliga vilja tær venda burtur hjarta tykkara eftir gudum sínum: Sálomon krøktist at hesum í kærleika.

3 Og hann hevði sjey hundrað konur, prinsessur, og trý hundrað medkonur: og konur hansara vendu burtur hjarta hansara.

4 Tí at tað bar á, tá ið Sálomon var gamalur, *at* konur hansara vendu burtur hjarta hansara eftir øðrum gudum: og hansara hjarta var ikki fullkomið við HARRANUM Guði hansara, eins og *var* hjarta Dávids, faðirs hansara.

5 Tí at Sálomon fór eftir Ăsjʼtõrĕth, gudinnu Zîdõʼnĭaranna; og eftir Mĭlʼcõm, andstygd Ammonitanna.

6 Og Sálomon gjørdi ilt í eygsjón HARRANS, og fór ikki fullvegis eftir HARRANUM, eins og *gjørdi* Dávid, faðir hansara.

7 Tá bygdi Sálomon eitt høgt pláss til Chĕʼmõsj, andstygd Móabs, á hólinum sum *er* frammanfyri Jerusalem, og til Molech-s, andstygd Ammons barna.

8 Og líkaleiðis gjørdi hann fyri allar sínar fremmandu konur, sum brendu roykilsi og sláturofraðu gudum sínum.

9 ¶ Og HARRIN varð vreiður við Sálomon, av tí at hjarta hansara varð vent frá HARRANUM Guði Ísraels, sum hevði birtst honum tværreisur,

10 Og hevði boðið honum viðvíkjandi hesum tingi, at hann skuldi ikki fara eftir øðrum gudum: men hann helt ikki tað sum HARRIN ábeyð.

11 Hvørsvegna HARRIN segði við Sálomon, Eftirsum at hetta er gjørt av tær, og tú hevurt ikki hildið sáttmála mín og ásetingar mínar, sum eg havi áboðið tær, eg vil vissuliga skræða kongadømið frá tær, og vil geva tað til tænara tíns.

12 Hóast hetta, í døgum tínum vil eg ikki gera tað fyri skuld Dávids, faðirs tíns: *men* eg vil skræða tað út úr hond sonar tíns.

13 Hvussu enn er, eg vil ikki skræða burtur alt kongadømið; *men* vil geva ĕina ættargrein til sonar tíns fyri skuld Dávids, tænara míns, og fyri skuld Jerusalems, sum eg havi valt.

14 ¶ Og HARRIN rørdi upp ein mótstandara yvirfyri Sálomoni, Háʼdăd Êdómítʼa: hann *var* av sáði kongsins í Ĕʼdóm.

15 Tí at tað bar á, tá ið Dávid var í Ĕʼdóm, og Jóʼăb, høvuðsmaðurin av herliðinum, var farin niðan at jarða hinar vignu, eftir *at* hann hevði sligið hvørt kallkyn í Ĕʼdóm;

16 (Tí at seks mánaðir varð Jóʼăb verandi har við øllum Ísrael, inntil hann hevði skorið av hvørt kallkyn í Ĕʼdóm:)

17 At Háʼdăd flýddi, hann og ávísir Êdómítʼar av tænarum faðirs hansara við honum, til at fara inn í Egyptaland; Háʼdăd *verandi* enn eitt lítið barn.

18 Og teir reistust úr Mĭʼdĭăn, og komu til Párʼăn: og teir tóku menn við sær út úr Párʼăn, og teir komu til Egyptalands, at Pharaoh kongi av Egyptalandi; sum gav honum eitt hús, og ásetti honum vistir, og gav honum land.

19 Og Háʼdăd fann miklan tokka í eygsjón Pharaohs, so at hann gav honum til konu systr-

ina hjá egnu konu síni, systrina hjá Tâh´-pĕn-ēs-i, drotningini.

20 Og systirin hjá Tâh´-pĕn-ēs-i føddi honum Gĕ-nū´-băth, son hansara, hvønn Tâh´-pĕn-ēs vandi av *brósti* í húsi Pharaohs: og Gĕ-nū´-băth var í húshaldi Pharaohs, millum sona Pharaohs.

21 Og tá ið Há´-dăd hoyrdi í Egyptalandi, at Dávid svav hjá fedrum sínum, og at Jó´-ăb, høvuðsmaðurin av herliðinum, var deyður, segði Há´-dăd til Pharaohs, Lat meg fara avstað, at eg má fara til egna lands míns.

22 Tá segði Pharaoh við hann, Men hvat hevur tær trotið hjá mær, at sí, tú søkirt at fara til egna lands tíns? Og hann svaraði, Einkið: hvussu enn er, lat meg fara ið hvussu er.

23 ¶ Og Guð rørdi honum upp *ein annan* mótstandara, Rē´-zŏn Ē-lî-á´-dăh son, sum flýddi frá harra sínum, Hăd-ă-rē´-zĕr-i kongi av Zō´-băh:

24 Og hann savnaði menn at sær, og gjørdist høvuðsmaður yvir einum liði, tá ið Dávid vá teir *úr Zō´-băh:* og teir fóru til Damascus, og dvaldust harí, og ríktu í Damascus.

25 Og hann var ein mótstandari fyri Ísrael allar dagar Sálomons, umframt meinið sum Há´-dăd *gjørdi:* og honum stóðst við Ísrael, og ríkti yvir Sýriu.

26 ¶ Og Jĕr-ó´-bô-ăm Nĕ´-băt-s sonur, ein Ĕph-ră-thīt´-i úr Zĕr´-ĕ-dă, tænari Sálomons, hvørs móðurs navn *var* Zĕ-rū´-ăh, ein einkjukvinna, enntá hann lyfti upp hond *sína* ímóti kongi.

27 Og henda *var* grundin *fyri*, at hann lyfti upp hond *sína* ímóti kongi: Sálomon bygdi Mīl´-lō, *og* umvældi skarðini av staði Dávids, faðirs síns.

28 Og maðurin Jĕr-ó´-bô-ăm *var* ein mektigur reystsemis maður: og Sálomon, síggjandi tann unga mannin, at hann var arbeiðssamur, gjørdi hann hann *til* stjórnara yvir allari álegging Jósephs húss.

29 Og tað bar á við ta tíðina tá ið Jĕr-ó´-bô-ăm fór út úr Jerusalem, at propheturin Á´-hī-jăh Sjî-lô-nīt´-i fann hann á veginum; og hann hevði klætt seg við einum nýggjum klæði; og teir tveir *vóru* einsamallir í akrinum:

30 Og Á´-hī-jăh fangaði tað nýggja klæðið sum *var* á honum, og skræddi tað *í* tólv stykkir:

31 Og hann segði til Jĕr-ó´-bô-ăm-s, Tak tær tíggju stykkir: tí at svá sigur HARRIN, Guð Ísraels, Sí, eg vil skræða kongadømið út úr hondini á Sálomoni, og vil geva tíggju ættargreinir til tín:

32 (Men hann skal hava ēina ættargrein fyri skuld tænara míns Dávids, og fyri skuld Jerusalems, staðin sum eg havi valt burtur úr øllum ættargreinum Ísraels:)

33 Av tí at teir hava yvirgivið meg, og hava tilbiðið Ăsj´-tō-rĕth — gudinnu Zî-dō´-nī-aranna, Chĕ-mōsj — gud Móabitanna, og Mīl´-cŏm — gud Ammons barna, og hava ikki gingið í vegum mínum, at gera *tað sum er* rætt í eygum mínum, og *at halda* ásetingar mínar og dómar mínar, eins og *gjørdi* Dávid, faðir hansara.

34 Hvussu enn er, eg vil ikki taka alt kongadømið út úr hond hansara: men eg vil gera hann *til* prins allar dagar lívs hansara fyri skuld Dávids, tænara míns, hvønn eg valdi, av tí at hann helt míni boð og mínar ásetingar:

35 Men eg vil taka kongadømið út úr hond sonar hansara, og vil geva tað at tær, *enntá* tíggju ættargreinir.

36 Og innat syni hansara vil eg geva ēina ættargrein, at Dávid, tænari mín, má hava eitt ljós alveg frammi fyri mær í Jerusalem, staðinum sum eg havi valt mær at seta navn mítt har.

37 Og eg vil taka teg, og tú skalt ríkja samsvarandi við alt sum sál tín tráar, og skalt vera kongur yvir Ísrael.
38 Og tað skal verða, um tú vilt geva gætur at øllum sum eg ábjóði tær, og vilt ganga í vegum mínum, og gera *tað sum er* rætt í eygsjón míni, at halda mínar ásetingar og míni boð, eins og Dávid, tænari mín, gjørdi; at eg vil vera við tær, og byggja tær eitt trygt hús, eins og eg bygdi til Dávids, og eg vil geva Ísrael at tær.
39 Og eg vil fyri hetta níva sáð Dávids, men ikki um ævir.
40 Sálomon royndi tí at drepa Jër-ó´-bô-ăm. Og Jër-ó´-bô-ăm reistist, og flýddi inn í Egyptaland, at Sjï´-sjăk kongi av Egyptalandi, og var í Egyptalandi inntil deyða Sálomons.
41 ¶ Og restin av gerningum Sálomons, og alt sum hann gjørdi, og hansara vísdómur, *eru* teir ikki skrivaðir í bók gerninga Sálomons?
42 Og tíðin sum Sálomon ríkti í Jerusalem, yvir øllum Ísrael, *var* fýrati ár.
43 Og Sálomon svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður í staði Dávids, faðirs síns: og Rë-hó´-bŏ-ăm, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 12

OG Rë-hó´-bŏ-ăm fór til Sjë´-chĕm: tí at allur Ísrael vóru komnir til Sjë´-chĕm at gera hann *til* kong.
2 Og tað bar á, tá ið Jër-ó´-bô-ăm Në´-băt-s sonur, sum var enn í Egyptalandi, hoyrdi *um tað,* (tí at hann var flýddur frá nærveru Sálomons kongs, og Jër-ó´-bô-ăm dvaldist í Egyptalandi;)
3 At teir sendu og rópaðu hann. Og Jër-ó´-bô-ăm og øll samkoma Ísraels kom, og talaðu við Rë-hó´-bŏ-ăm, sigandi,
4 Faðir tín gjørdi ok okkara svárligt: nú tessvegna, geri tú hina svárligu tænastu faðirs míns, og hansara tunga ok sum hann koyrdi uppá okkum, lættari, og vit vilja tæna tær.
5 Og hann segði við teir, Farið avstað enn *í* tríggjar dagar, síðan komið aftur til mín. Og fólkið fór avstað.
6 ¶ Og Rë-hó´-bŏ-ăm kongur ráðførdist við teir gomlu menninar, sum stóðu frammi fyri Sálomoni, faðir sínum, meðan hann enn livdi, og segði, Hvussu tilráða tit, at eg má svara hesum fólkinum?
7 Og teir talaðu við hann, sigandi, Um tú vilt vera ein tænari at hesum fólkinum henda dag, og vilt tæna teimum, og svara teimum, og tala góð orð til teirra, so vilja teir vera tænarar tínir um ævir.
8 Men hann yvirgav ráðið hjá teimum gomlu monnunum, sum teir høvdu givið honum, og ráðførdist við teir ungu menninar, sum vóru vaksnir upp við honum, *og* sum stóðu frammi fyri honum:
9 Og hann segði við teir, Hvat ráð geva tit, at vit mega svara hesum fólkinum, sum hava talað til mín, sigandi, Ger okið, sum faðir tín koyrdi uppá okkum, lættari?
10 Og teir ungu menninir, sum vóru vaksnir upp við honum, talaðu við hann, sigandi, Svá skalt tú tala við hetta fólk, sum talaði við teg, sigandi, Faðir tín gjørdi ok okkara tungt, men geri tú *tað* lættari at okkum; svá skalt tú siga við teir, Mín lítli *fingur* skal vera tjykri enn lendar faðirs míns.
11 Og nú, hvar ið faðir mín løddi tykkum við einum tungum oki, vil eg leggja afturat til oks tykkara: faðir mín hevur agað tykkum við koyrlum, men eg vil aga tykkum við sporðdrekum.

12 ¶ So Jĕr-ó´-bô-ăm og alt fólkið komu til Rĕ-hó´-bŏ-ăm-s hin triðja dagin, eins og kongur hevði fyriskipað, sigandi, Komið til mín aftur hin triðja dagin.

13 Og kongur svaraði fólkinum knortlasliga, og yvirgav ráð hinna gomlu manna, sum teir góvu honum;

14 Og talaði til teirra eftir ráðinum hjá teimum ungu monnunum, sigandi, Faðir mín gjørdi ok tykkara tungt, og eg vil leggja afturat til oks tykkara: faðir mín *eisini* agaði tykkum við koyrlum, men eg vil aga tykkum við sporðdrekum.

15 Hvørsvegna kongur gav ikki gætur at fólkinum; tí at søkin var frá HARRANUM, at hann mátti útinna sína framsøgn, sum HARRIN talaði við Á´-hī-jăh Sjī-lô-nĭt´-a við Jĕr-ó´-bô-ăm Nĕ´-băt-s son.

16 ¶ So tá ið allur Ísrael sá, at kongur gav ikki gætur at teimum, svaraði fólkið kongi, sigandi, Hvønn skamt hava vit í Dávidi? eiheldur *hava vit* arv í syni Ísai-s: til tjalda tykkara, O Ísrael: nú, síggj til egna húss tíns, Dávid. So Ísrael fór avstað at tjøldum sínum.

17 Men *hvat viðvíkur* Ísraels børnum, sum dvaldust í staðum Judah, Rĕ-hó´-bŏ-ăm ríkti yvir teimum.

18 Tá sendi Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongur Á´-dôr-ăm, sum *var* yvir íkastinum; og allur Ísrael steinaðu hann við steinum, at hann doyði. Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongur tí gjørdi skjótt *av* at sleppa sær upp til vagn sín, at flýggja til Jerusalem.

19 So Ísrael gjørdi uppreist í móti húsi Dávids at hesum degi.

20 Og tað bar á, tá ið allur Ísrael hoyrdi, at Jĕr-ó´-bô-ăm var komin aftur, at teir sendu og kallaðu hann at samkomuni, og gjørdu hann *til* kong yvir øllum Ísrael: tað var eingin sum fylgdi húsi Dávids, uttan ættargrein Judah einans.

21 ¶ Og tá ið Rĕ-hó´-bŏ-ăm var komin til Jerusalem, savnaði hann alt Judah hús saman, við ættargrein Benjamins, eitt hundrað og fýrsinstjúgu túsund útvaldar menn, sum vóru stríðsmenn, at berjast ímóti húsi Ísraels, at føra kongadømið aftur til Rĕ-hó´-bŏ-ăm-s Sálomons sonar.

22 Men orð Guðs kom at Sjĕm-aĭ´-ăh, Guðs manninum, sigandi,

23 Tala við Rĕ-hó´-bŏ-ăm, son Sálomons, kong av Judah, og við alt hús Judah og Benjamins, og til leivdina av fólkinum, sigandi,

24 Svá sigur HARRIN, Tit skulu ikki fara upp, ella berjast ímóti brøðrum tykkara, børnum Ísraels: vendið aftur hvør maður til hús sítt; tí at hetta tingið er frá mær. Teir góvu gætur tessvegna eftir orði HARRANS, og vendu aftur til at fara avstað, samsvarandi við orð HARRANS.

25 ¶ Tá bygdi Jĕr-ó´-bô-ăm Sjĕ´-chĕm á Ē´-phră-ĭm fjalli, og dvaldist harí; og fór út haðani frá, og bygdi Pĕn´-ū-ĕl.

26 Og Jĕr-ó´-bô-ăm segði í hjarta sínum, Nú skal kongadømið venda aftur til húsar Dávids:

27 Um hetta fólk fari niðan at inna sláturofran í húsi HARRANS í Jerusalem, tá skal hjartað hjá hesum fólki venda aftur at harra teirra, *enntá* at Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongi av Judah, og teir skulu drepa meg, og fara aftur til Rĕ-hó´-bŏ-ăm-s kongs av Judah.

28 Við hvat kongur helt ráð, og gjørdi tveir kálvar *av* gulli, og segði við teir, Tað er ov mikið hjá tykkum at fara niðan til Jerusalem: síggj gudar tínar, O Ísrael, sum førdu teg upp úr Egyptalandi.

29 Og hann setti tann ēina í Beth-el, og hīn stillaði hann í Dán.

30 Og hetta tingið gjørdist ein synd: tí at fólkið fór *fyri at tilbiðja* frammanfyri tann ēina, *enntá* at Dán.

31 Og hann gjørdi eitt hús av høgum plássum, og gjørdi prestar av teimum lægstu av fólkinum, sum vóru ikki av sonum Levīs.

32 Og Jĕr-ó´-bô-ăm innsetti eina hátíð í tí áttanda mánaðinum, á hinum fimtanda degi mánaðarins, lík hátíðini sum *er* í Judah, og hann ofraði uppiá altarinum. Soleiðis gjørdi hann í Beth-el, sláturofrandi kálvunum sum hann hevði gjørt: og hann staðsetti í Beth-el prestarnar av teimum høgu plássunum sum hann hevði gjørt.

33 So hann ofraði uppiá altarinum, sum hann hevði gjørt í Beth-el, hin fimtanda dagin av tí áttanda mánaðinum, *enntá* í tí mánaðinum sum hann hevði upphugsað av egna hjarta sínum; og innsetti eina hátíð at Ísraels børnum: og hann ofraði uppiá altarinum, og brendi roykilsi.

KAPITUL 13

OG sí, tað kom ein Guðs maður út úr Judah eftir orði HARRANS at Beth-el: og Jĕr-ó´-bôăm stóð við altarið til at brenna roykilsi.

2 Og hann rópaði ímóti altarinum í orði HARRANS, og segði, O altar, altar, svá sigur HARRIN; Sí, eitt barn skal verða føtt at húsi Dávids, Jó´-sĭ-ăh at navni; og uppiá tær skal hann ofra prestarnar av teimum høgu plássunum, sum brenna roykilsi uppiá tær, og mannabein skulu verða brend uppiá tær.

3 Og hann gav eitt tekin hin sama dagin, sigandi, Hetta *er* tekinið sum HARRIN hevur talað; Sí, altarið skal verða skrætt, og øskurnar, sum *eru* uppiá tí, skulu verða heltar út.

4 Og tað bar á, tá ið Jĕr-ó´-bôăm kongur hoyrdi framsøgnina hjá Guðs manninum, sum hevði rópað ímóti altarinum í Beth-el, at hann koyrdi fram sína hond frá altarinum, sigandi, Leggið hald á hann. Og hansara hond, sum hann koyrdi fram ímóti honum, tornaði upp, so at hann kundi ikki hála hana inn aftur til sín.

5 Altarið eisini varð skrætt, og øskurnar heltar út frá altarinum, samsvarandi við tekinið sum Guðs maðurin hevði givið eftir orði HARRANS.

6 Og kongur svaraði og segði við Guðs mannin, Bøna nú andlit HARRANS Guðs tíns, og bið fyri mær, at mín hond má verða endurbøtt mær aftur. Og Guðs maðurin bønaði HARRAN, og hondin hjá kongi varð endurbøtt honum aftur, og gjørdist eins og *hon var* áður.

7 Og kongur segði við Guðs mannin, Kom heim við mær, og endurfríska teg, og eg vil geva tær eitt endurgjald.

8 Og Guðs maðurin segði við kong, Um tú vilt geva mær helming húss tíns, vil eg ikki fara inn við tær, eiheldur vil eg eta breyð, ella drekka vatn, í hesum plássi:

9 Tí at soleiðis varð tað álagt mær við orði HARRANS, sigandi, Et einkið breyð, ella drekk vatn, ella vend aftur eftir hinum sama vegi sum tú komst.

10 So hann fór ein annan veg, og fór ikki aftur eftir veginum sum hann kom til Beth-el.

11 ¶ Nú, tað búði ein gamal prophetur í Beth-el; og hansara synir komu og søgdu honum øll verkini sum Guðs maðurin hevði gjørt tann dagin í Beth-el: orðini, sum hann hevði talað kongi, tey søgdu teir eisini fyri faðir sínum.

12 Og teirra faðir segði við teir, Hvønn veg fór hann? Tí at synir hansara høvdu sæð hvønn veg Guðs maðurin fór, sum kom frá Judah.

13 Og hann segði við synir sínar, Saðlið mær asnan. So teir saðlaðu honum asnan: og hann reið hará,

14 Og fór aftaná Guðs manninum, og fann hann, sitandi undir eini eik: og hann segði við hann, *Ert* tú Guðs maðurin sum komst frá Judah? Og hann segði, Eg *eri*.

15 Tá segði hann við hann, Kom heim við mær, og et breyð.

16 Og hann segði, Eg má ikki fara aftur við tær, ella fara inn við tær: eiheldur vil eg eta breyð, ella drekka vatn við tær í hesum plássi:

17 Tí at tað varð sagt til mín við orði HARRANS, Tú skalt einkið breyð eta, ella drekka vatn har, ella venda aftur til at fara eftir tí vegi sum tú komst.

18 Hann segði við hann, Eg *eri* ein prophetur eisini, eins og tú *ert;* og ein eingil talaði við meg við orði HARRANS, sigandi, Før hann aftur við tær inn í hús títt, at hann má eta breyð og drekka vatn. *Men* hann leyg at honum.

19 So hann fór tilbakar við honum, og át breyð í húsi hans, og drakk vatn.

20 ¶ Og tað bar á, sum teir sótu við borðið, at orð HARRANS kom at prophetinum sum førdi hann aftur:

21 Og hann geylaði at Guðs manninum sum kom frá Judah, sigandi, Svá sigur HARRIN, Eftirsum at tú hevurt vanlýtt munn HARRANS, og hevurt ikki hildið boðið sum HARRIN Guð tín skipaði tær,

22 Men komst tilbakar, og hevurt etið breyð og drukkið vatn í tí plássi, um hvørt *HARRIN* segði til tín, Et einkið breyð, og drekk einkið vatn; títt ræ skal ei koma at gravhýsi fedra tína.

23 ¶ Og tað bar á, eftir *at* hann hevði etið breyð, og eftir *at* hann hevði drukkið, at hann saðlaði fyri hann asnan, *tað vil siga,* fyri prophetin, hvønn hann ført hevði aftur.

24 Og tá ið hann var farin, ein leyva møtti honum eftir veginum, og vó hann: og ræ hansara varð kastað á vegin, og asnin stóð hjá tí, leyvan eisini stóð hjá ræinum.

25 Og sí, menn fóru framvið, og sóu ræið kastað á vegin, og leyvuna, standandi hjá ræinum: og teir komu og søgdu frá *tí* í staðinum, har hin gamli prophetur in dvaldist.

26 Og tá ið propheturin, sum førdi hann aftur frá veginum, hoyrdi *harum,* segði hann, Tað *er* Guðs maðurin, sum var vanlýðin orði HARRANS: HARRIN tí hevur flýggjað hann at leyvuni, sum hevur skrætt hann, og vigið hann, samsvarandi við orð HARRANS, sum hann talaði honum.

27 Og hann talaði til sona sína, sigandi, Saðlið mær asnan. Og teir saðlaðu *hann.*

28 Og hann fór og fann ræ hansara kastað á vegin, og asnan og leyvuna, standandi hjá ræinum: leyvan hevði ikki etið ræið, ella skrætt asnan.

29 Og propheturin tók upp ræið av Guðs manninum, og legði tað uppá asnan, og førdi tað aftur: og hin gamli propheturin kom til staðarins, at harma og at jarða hann.

30 Og hann legði ræ hansara í sína egnu grøv; og teir harmaðu yvir honum, *sigandi,* Akk, bróðir mín!

31 Og tað bar á, eftir *at* hann hevði jarðað hann, at hann talaði til sona sína, sigandi, Tá ið eg eri

deyður, tá jarðið meg í gravhýsinum, í hvørjum Guðs maðurin *er* jarðaður; leggið beinini hjá mær við síðuna av beinunum hjá honum:

32 Tí at framsøgnin sum hann rópaði viðˆ orði HARRANS ímóti altarinum í Beth-el, og ímóti øllum húsunum av teimum høgu plássunum sum *eru* í staðunum av Să-mâr´-ĭ-ŭ, skal vissuliga bera á.

33 ¶ Eftir henda lut vendi Jĕr-ó´-bô-ăm ikki aftur frá illa vegi sínum, men gjørdi aftur av teimum lægstu av fólkinum prestar av teimum høgu plássunum: hvørsumhelst *ið* vildi, hann innvígaði hann, og hann gjørdist *ein* av prestunum av teimum høgu plássunum.

34 Og hetta tingið gjørdist synd innat húsi Jĕr-ó´-bô-ăm-s, enntá til at skera *tað* av, og til at oyða *tað* omanav ásjón jarðarinnar.

KAPITUL 14

Á TEIRRI tíð fell Á´-bĭ-jăh Jĕr-ó´-bô-ăm-s sonur sjúkur.

2 Og Jĕr-ó´-bô-ăm segði til konu sína, Reis *teg,* eg biði teg, og dulbúgv teg, at tú ei verði kend at vera kona Jĕr-ó´-bô-ăm-s; og slepp tær til Sjĭ´-lôh: sí, har *er* Á´-hĭ-jăh prophetur, sum segði mær, at *eg skuldi vera* kongur yvir hesum fólkinum.

3 Og tak við tær tíggju heilbreyð, og knaskikeksˇ, og eina krukku av hunangi, og far til hansara: hann skal siga tær, hvat skal verða av barninum.

4 Og Jĕr-ó´-bô-ăm-s kona so gjørdi, og reistist, og fór til Sjĭ´-lôh, og kom til húsar Á´-hĭ-jăh. Men Á´-hĭ-jăh kundi ikki síggja; tí at eygu hans vóru stillaði uppá grund av aldri hans.

5 ¶ Og HARRIN segði við Á´-hĭ-jăh, Sí, kona Jĕr-ó´-bô-ăm-s kemur at umbiðja eitt ting av tær fyri son sín; tí at hann *er* sjúkur: soleiðis og soleiðis skalt tú siga við hana: tí at tað skal verða, tá ið hon kemur inn, at hon skal látast *vera* ein onnur *kvinna*.

6 Og tað varð *so,* tá ið Á´-hĭ-jăh hoyrdi ljóðið av fótum hennara, sum hon kom inn við hurðina, at hann segði, Kom inn, tú kona Jĕr-ó´-bô-ăm-s; hví letst tú *vera* ein onnur? tí at eg *eri* sendur til tín *við* tungum *tíðindum*.

7 Far, sig Jĕr-ó´-bô-ăm-i, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Eftirsum at eg upphevjaði teg burturúr fólkinum, og gjørdi teg *til* prins yvir fólki mínum Ísrael,

8 Og skræddi kongadømið burtur frá húsi Dávids, og gav tað tær: og *tó* hevurt tú ikki verið sum tænari mín Dávid, sum helt boðini hjá mær, og sum fylgdi mær við øllum hjarta sínum, at gera *tað* einans *sum var* rætt í eygum mínum;

9 Men hevurt gjørt ilt uppum allar sum vóru undan tær: tí at tú hevurt farið og gjørt tær aðrar gudar, og bræddar myndir, til at tirra meg til firtnis, og hevurt kastað meg afturum tín rygg:

10 Tessvegna, sí, eg vil føra ilt uppá hús Jĕr-ó´-bô-ăm-s, og vil skera av frá Jĕr-ó´-bô-ăm-i hann sum mígur ímóti vegginum, *og* hann sum er lokaður inni og eftirlatin í Ísrael, og vil taka burtur leivdina av húsi Jĕr-ó´-bô-ăm-s, eins og ein maður tekur burt tøð, til tað verði alt farið.

11 Hann, sum doyr hjá Jĕr-ó´-bô-ăm-i í staðinum, skulu hundarnir eta; og hann, sum doyr í akrinum, skulu fuglar luftarinnar eta: tí at HARRIN hevur talað *tað*.

12 Reis tú *teg* tessvegna, slepp tær til egna húss tíns: *og* tá ið føtur tínir koma inn í staðin, skal barnið doyggja.

13 Og alt Ísrael skal harma yvir hann, og jarða hann: tí at hann einans hjá Jĕr-ó´-bô-ăm-i skal koma

til gravarinnar, av tí at í honum varð tað funnin *onkur* góður lutur mótvegis HARRANUM Guði Ísraels í húsi Jĕr-ó´-bô-ăm-s.

14 Harafturat skal HARRIN reisa sær upp ein kong yvir Ísrael, sum skal skera av hús Jĕr-ó´-bô-ăm-s tann dagin: men hvat? enntá nú.

15 Tí at HARRIN skal sláa Ísrael, sum eitt sev verður skakað í vatninum, og hann skal taka Ísrael upp við rót út úr hesum góða landi, sum hann gav til fedra teirra, og skal spjaða teir handan ánna, av tí at teir hava gjørt sínar lundir, tirrandi HARRAN til firtnis.

16 Og hann skal geva Ísrael upp uppá grund av syndum Jĕr-ó´-bô-ăm-s, sum gjørdi synd, og sum fekk Ísrael at synda.

17 ¶ Og Jĕr-ó´-bô-ăm-s kona reistist, og fór avstað, og kom til Tĭr´-zăh: *og* tá ið hon kom til gáttina á hurðini, doyði barnið;

18 Og tey jarðaðu hann; og alt Ísrael harmaði yvir hann, samsvarandi við orð HARRANS, sum hann talaði við^ hendi tænara síns Á´-hĭ-jăh prophets.

19 Og restin av gerningum Jĕr-ó´-bô-ăm-s, hvussu hann kríggjaði, og hvussu hann ríkti, sí, teir *eru* skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga.

20 Og dagarnir, sum Jĕr-ó´-bô-ăm ríkti, *vóru* tvey og tjúgu ár: og hann svav hjá fedrum sínum, og Nádab, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

21 ¶ Og Rĕ-hó´-bŏ-ăm Sálomons sonur ríkti í Judah. Rĕ-hó´-bŏ-ăm *var* fjøruti og ēitt ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti seytjan ár í Jerusalem, staðinum sum HARRIN valdi burtur úr øllum ættargreinum Ísraels, at seta navn sítt har. Og navn móður hansara *var* Ná´-ă-măh, ein Ammonitinna.

22 Og Judah gjørdi ilt í eygsjón HARRANS, og teir tirraðu hann til ástbrelnis við sínum syndum sum teir høvdu framt, uppum alt sum teirra fedrar høvdu gjørt.

23 Tí at teir eisini bygdu sær høg pláss, og myndir, og lundir, á hvørjum høgum heyggi, og undir hvørjum grønum træi.

24 Og tað vóru eisini sodomitar í landinum: *og* teir gjørdu samsvarandi við allar andstygdir tjóðanna, sum HARRIN kastaði út undan børnum Ísraels.

25 ¶ Og tað bar á í tí fimta árinum hjá Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongi, *at* Sjĭ´-sjăk kongur av Egyptalandi kom upp ímóti Jerusalem:

26 Og hann tók burt dýrgripir HARRANS húss, og dýrgripir kongshússins; hann enntá tók burtur alt: og hann tók burtur allar skjøldrarnar av gulli, sum Sálomon hevði gjørt.

27 Og Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongur gjørdi í teirra stað messing skildir, og leit *teir* upp at hondum hinna fremstu av lívverjuni, sum varðaðu dyr kongshússins.

28 Og tað var *so,* tá ið kongur fór inn í hús HARRANS, at lívverjan bar teir, og førdi teir aftur inn í lívverju kamarið.

29 ¶ Nú, restin av gerningum Rĕ-hó´-bŏ-ăm-s, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

30 Og tað var kríggj ímillum Rĕ-hó´-bŏ-ăm og Jĕr-ó´-bô-ăm allar dagar *teirra.*

31 Og Rĕ-hó´-bŏ-ăm svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður hjá fedrum sínum í staði Dávids. Og navn móður hansara *var* Ná´-ă-măh, ein Ammonitinna. Og Á´-bĭ-jăm, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 15

NÚ, í tí átjanda árinum hjá Jĕr-ó´-bô-ăm kongi Nē´-băt-s syni, ríkti Á´-bĭ-jăm yvir Judah.

2 Trý ár ríkti hann í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Mā´-ă-châh, dóttir Ă-bī´-sjă-lŏm-s.

3 Og hann gekk í øllum syndum faðirs síns, sum hann hevði gjørt undan honum: og hjarta hansara var ikki fullkomið hjá HARRANUM Guði sínum, sum hjarta Dávids, faðirs hansara.

4 Hóast hetta, fyri skyld Dávids gav HARRIN Guð hansara honum eina lampu í Jerusalem, at seta upp son hansara eftir hann, og at grundfesta Jerusalem:

5 Av tí at Dávid gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygum HARRANS, og vendi ikki til viks frá nøkrum *tingi* sum hann ábjóðaði honum allar dagar lívs hansara, uttan einans í málevni Ū´-rī-ăh Hittita.

6 Og tað var kríggj ímillum Rē-hó´-bŏ-ăm og Jĕr-ó´-bô-ăm allar dagar lívs hansara.

7 Nú, restin av gerningum Á´-bī-jăm-s, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga? Og tað var kríggj ímillum Á´-bī-jăm og Jĕr-ó´-bô-ăm.

8 Og Á´-bī-jăm svav hjá fedrum sínum; og teir jarðaðu hann í staði Dávids: og Á´-să, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

9 ¶ Og í tí tjúgunda árinum hjá Jĕr-ó´-bô-ăm kongi av Ísrael ríkti Á´-să yvir Judah.

10 Og fjøruti og ēitt ár ríkti hann í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Mā´-ă-chăh, dóttir Ă-bī´-sjă-lŏm-s.

11 Og Á´-să gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygum HARRANS, eins og *gjørdi* Dávid, faðir hansara.

12 Og hann tók burtur sodomitarnar út úr landinum, og beindi burtur allar skurðgudarnar, sum hansara fedrar høvdu gjørt.

13 Og eisini Má´-ă-chŭh, móður sína, enntá hana tók hann burtur frá *at vera* drotning, av tí at hon hevði gjørt ein skurðgud í eini lund; og Á´-să oyddi skurðgud hennara, og brendi *hann* við áarløkin Kī´-drŏn.

14 Men tey høgu plássini vórðu ikki beind burtur: hóast hetta, Á´-să-s hjarta var fullkomið hjá HARRANUM allar dagar hansara.

15 Og hann førdi inn tingini sum faðir hansara hevði innvígað, og tingini sum sjálvur hann hevði innvígað, inn í hús HARRANS, silvur, og gull, og reiðir.

16 ¶ Og tað var kríggj ímillum Á´-să og Bā-ăsj´-ă kong av Ísrael, allar dagar teirra.

17 Og Bā-ăsj´-ă kongur av Ísrael legði avstað ímóti Judah, og bygdi Rá´-măh, at hann ikki mátti loyva nøkrum at fara út ella koma inn til Á´-să kongs av Judah.

18 Tá tók Á´-să alt silvurið og gullið, *sum vóru* eftir av dýrgripum HARRANS húss, og dýrgripum kongshússins, og flýggjaði teir inn í hond tænara sína: og kong Á´-să sendi teir til Bĕn-há´-dăd-s, sonar Tăb-rĭm´-ŏn-s, sonar Hē´-zī-ŏn-s, Sýriu kongs, sum dvaldist í Damascus, sigandi,

19 *Tað er* eitt bandalag ímillum meg og teg, *og* ímillum faðir mín og faðir tín: sí, eg havi sent at tær eina gávu av silvuri og gulli; kom og brót títt bandalag við Bā-ăsj´-ă kong av Ísrael, at hann má fara burtur frá mær.

20 So Bĕn-há´-dăd lýddi á kong Á´-să, og sendi høvuðsmenninar av herliðunum, sum hann hevði, ímóti staðunum av Ísrael, og sló Ī´-jŏn, og Dán, og Á´-bĕl-bĕth-mā´-ă-chăh, og alt Cĭn´-nĕ-rōth, við øllum landi Năph´-tâ-lī-s.

21 Og tað bar á, tá ið Bā-ăsj´-ă hoyrdi *harum,* at hann lætti av bygging av Rá´-măh, og dvaldist í Tĭr´-zăh.

22 Tá gjørdi kong Á´-să eina yvirlýsing út gjøgnum alt Judah; eingin *var* undantikin: og teir tóku burtur steinarnar av Rá´-măh, og

timbur tess, við hvørjum Bā-ăsj´-ă hevði bygt; og kong Á´-să bygdi við teimum Gē´-bă Benjamins, og Mizpah.

23 Restin av øllum gerningum Á´-să-s, og allur hansara máttur, og alt sum hann gjørdi, og staðirnir sum hann bygdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga? Hóast hetta, í tíðini av gamla aldri sínum var hann sjúklaður í fótum sínum.

24 Og Á´-să svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður hjá fedrum sínum í staði Dávids, faðirs síns: og Jē-hō´-sjâ-phăt, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

25 ¶ Og Nádab Jĕr-ó´-bô-ăm-s sonur byrjaði at ríkja yvir Ísrael í øðrum ári Á´-să kongs av Judah, og ríkti yvir Ísrael tvey ár.

26 Og hann gjørdi ilt í eygsjón HARRANS, og gekk í vegi faðirs síns, og í síni synd, hvarvið hann fekk Ísrael at synda.

27 ¶ Og Bā-ăsj´-ă Á´-hī-jăh sonur, av húsi Ís´-să-chăr-s, samansvór ímóti honum; og Bā-ăsj´-ă sló hann við Gĭb´-bē-thŏn, sum *hoyrdi* til Philistanna; tí at Nádab og allur Ísrael løgdu kringseting til Gĭb´-bē-thŏn-s.

28 Enntá í tí triðja árinum hjá Á´-să kongi av Judah vá Bā-ăsj´-ă hann, og ríkti í hansara stað.

29 Og tað bar á, tá ið hann ríkti, *at* hann sló alt hús Jĕr-ó´-bô-ăm-s; hann eftirlæt ikki til Jĕr-ó´-bô-ăm-s nakran sum andaði, inntil hann hevði oytt hann, samsvarandi við HARRANS framsøgn, hvørja hann talaði við tænara sínum Á´-hī-jăh Sjī-lô-nīt´-a:

30 Uppá grund av Jĕr-ó´-bô-ăm-s syndum, sum hann syndaði, og sum hann fekk Ísrael *at* synda, við síni tirran, hvarvið hann tirraði HARRAN Guð Ísraels til firtnis.

31 ¶ Nú, restin av gerningum Nádabs, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

32 Og tað var kríggj ímillum Á´-să og Bā-ăsj´-ă kong av Ísrael allar dagar teirra.

33 Í tí triðja árinum hjá Á´-să kongi av Judah byrjaði Bā-ăsj´-ă Á´-hī-jăh sonur at ríkja yvir øllum Ísrael í Tĭr´-zăh, tjúgu og fýra ár.

34 Og hann gjørdi ilt í eygsjón HARRANS, og gekk í vegi Jĕr-ó´-bô-ăm-s, og í síni synd, hvarvið hann fekk Ísrael at synda.

KAPITUL 16

TÁ kom orð HARRANS til Jehu-s Hă-nā´-nī-s sonar ímóti Bā-ăsj´-ă, sigandi,

2 Eftirsum at eg upphevjaði teg burtur úr dustinum, og gjørdi teg *til* prins yvir fólki mínum Ísrael; og tú hevurt gingið í vegi Jĕr-ó´-bô-ăm-s, og hevurt fingið fólk mítt Ísrael at synda, at tirra meg til firtnis við sínum syndum;

3 Sí, eg vil taka burtur eftirkomarar Bā-ăsj´-ă-s, og eftirkomarar húss hans; og vil gera hús títt líka *sum* hús Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nē´-băt-s sonar.

4 Hann, sum doyr hjá Bā-ăsj´-ă í staðinum, skulu hundarnir eta; og hann, sum doyr av hansara í akrunum, skulu fuglar luftarinnar eta.

5 Nú, restin av gerningum Bā-ăsj´-ă-s, og hvat hann gjørdi, og hansara máttur, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

6 So Bā-ăsj´-ă svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður í Tĭr´-zăh: og Ē´-lăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

7 Og eisini við hendi prophetsins Jehu-s Hă-nā´-nī-s sonar kom orð HARRANS ímóti Bā-ăsj´-ă, og ímóti húsi hansara, enntá fyri alt tað illa sum hann gjørdi í eygsjón HARRANS, í at tirra hann til firtnis við verki handa sína, í at vera líka

sum hús Jĕr-ó´-bô-ăm-s; og av tí at hann drap hann.

8 ¶ Í tí tjúgu og sætta árinum hjá Á´-să kongi av Judah byrjaði Ē´-lăh Bā-ăsj´-ă sonur at ríkja yvir Ísrael í Tĭr´-zăh, tvey ár.

9 Og hansara tænari Zimrī, høvuðsmaður av helvt*ini* av vagnum *hansara*, samansvór ímóti honum, sum hann var í Tĭr´-zăh, drekkandi seg druknan í húsi Arza, bústjóra húss *síns* í Tĭr´-zăh.

10 Og Zimrī fór inn og sló hann, og drap hann, í tí tjúgu og sjeynda árinum hjá Á´-să kongi av Judah, og ríkti í hansara stað.

11 ¶ Og tað bar á, tá ið hann byrjaði at ríkja, so skjótt sum hann sat á hásæti sínum, *at* hann vá alt hús Bā-ăsj´-ă-s: hann eftirlæt honum ikki ēin sum mígur ímóti vegginum, hvørki av skyldfólkum hansara, ella av vinum hansara.

12 Soleiðis oyddi Zimrī alt hús Bā-ăsj´-ă-s, samsvarandi við orð HARRANS, sum hann talaði ímóti Bā-ăsj´-ă viðˆ Jehu prop<u>h</u>eti,

13 Fyri allar syndir Bā-ăsj´-ă-s, og syndir Ē´-lăh-s, sonar hansara, við hvørjum teir syndaðu, og við hvørjum teir fingu Ísrael at synda, í at upptirra HARRAN Guð Ísraels til firtnis við fáfongdum sínum.

14 Nú, restin av gerningum Ē´-lăh-s, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

15 ¶ Í tí tjúgu og sjeynda árinum hjá Á´-să kongi av Judah, ríkti Zimrī sjey dagar í Tĭr´-zăh. Og fólkið *vóru* leiraðir ímóti Gĭb´-bē-thŏn, sum *hoyrdi* til Philistanna.

16 Og fólkið, *sum vóru* leiraðir, hoyrdu sagt, Zimrī hevur samansvorið, og hevur eisini vigið kong: hvørsvegna allur Ísrael gjørdu Omrī, høvuðsmannin av herliðinum, *til* kong yvir Ísrael tann dagin í leirinum.

17 Og Omrī fór upp frá Gĭb´-bē-thŏn, og allur Ísrael við honum, og teir kringsettu Tĭr´-zăh.

18 Og tað bar á, tá ið Zimrī sá, at staðurin var tikin, at hann fór inn í slottið av kongshúsinum, og brendi kongshúsið yvir seg við eldi, og doyði,

19 Fyri sínar syndir sum hann syndaði, í at gera ilt í eygsjón HARRANS, í at ganga í vegi Jĕr-ó´-bô-ăm-s, og í síni synd sum hann gjørdi, at fáa Ísrael at synda.

20 Nú, restin av gerningum Zimrī-s, og hansara hásvik sum hann virkaði, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

21 ¶ Tá vórðu fólk Ísraels deildir í tveir partar: helvt*in* av fólkinum fylgdi Tĭb´-nī Gĭ´-năth-s syni, at gera hann *til* kong; og helvt*in* fylgdi Omrī.

22 Men fólkið sum fylgdi Omrī hevði yvirvág ímóti fólkinum sum fylgdi Tĭb´-nī Gĭ´-năth-s syni: so Tĭb´-nī doyði, og Omrī ríkti.

23 ¶ Í tí tríati og fyrsta árinum hjá Á´-să kongi av Judah byrjaði Omrī at ríkja yvir Ísrael, tólv ár: seks ár ríkti hann í Tĭr´-zăh.

24 Og hann keypti heyggin Să-mâr´-ĭ-â av Sjē´-mĕr-i fyri tvær talentir av silvuri, og bygdi á heyggin, og kallaði navnið á staðinum, sum hann bygdi, eftir navni Sjē´-mĕr-s, eigara av heygnum, Să-mâr´-ĭ-â.

25 ¶ Men Omrī virkaði ilt í eygsjón HARRANS, og gjørdi verri enn allir sum *vóru* undan honum.

26 Tí hann gekk í øllum vegi Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nē´-băt-s sonar, og í hansara synd, hvarvið hann fekk Ísrael at synda, at tirra HARRAN Guð Ísraels til firtnis við fáfongdum sínum.

27 Nú, restin av gerningum Omrī-s sum hann gjørdi, og hansara máttur sum hann sýndi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?
28 So Omrī svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður í Să-mâr´-ī-ŭ: og Áhab, sonur hansara, ríkti í hansara stað.
29 ¶ Og í tí tríati og áttunda árinum hjá Á´-să kongi av Judah byrjaði Áhab Omrī-s sonur at ríkja yvir Ísrael: og Áhab Omrī-s sonur ríkti yvir Ísrael í Să-mâr´-ī-ŭ tjúgu og tvey ár.
30 Og Áhab Omrī-s sonur gjørdi ilt í eygsjón HARRANS uppum allar sum *vóru* undan honum.
31 Og tað bar á, sum um tað hevði verið eitt lætt*isligt* ting hjá honum at ganga í syndum Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nĕ´-băt-s sonar, at hann tók til konu Jĕz´-ĕ-bĕl, dóttur Ĕth-bā´-ăl-s kongs av Zī-dō´-nĭ-ar-unum, og fór og tænti Bā´-ăl-i, og tilbað hann.
32 Og hann reisti upp eitt altar til Bā´-ăl-s í húsi Bā´-ăl-s, sum hann hevði bygt í Să-mâr´-ĭ-ŭ.
33 Og Áhab gjørdi eina lund; og Áhab gjørdi meir til at tirra HARRAN Guð Ísraels til firtnis enn allir kongar Ísraels, sum vóru undan honum.
34 ¶ Á hansara døgum bygdi Hī´-ĕl, Beth-elit-in, Jericho: hann legði hansara grundvøll í Á´-bī-răm-i, sínum frumborna, og setti upp hansara portur í sínum yngsta *syni* Sĕ´-gŭb, samsvarandi við HARRANS orð, sum hann talaði við Josjua Nuns syni.

KAPITUL 17

OG Ê-lī´-jăh Tĭsj-bĭt´-i, *sum var* av íbúgvum Gileads, segði við Áhab, *Sum* HARRIN Guð Ísraels livir, frammi fyri hvørjum eg standi, tað skal ikki vera døgg, ella regn, hesi árini, uttan samsvarandi við orð mítt.
2 Og HARRANS orð kom at honum, sigandi,
3 Slepp tær hiðani, og vend tær eystureftir, og fjal teg við áarløkin Chē´-rĭth, sum *er* frammanfyri Jordan.
4 Og tað skal verða, *at* tú skalt drekka úr áarløkinum; og eg havi skipað ravnunum at føða teg har.
5 So hann fór og gjørdi samsvarandi orði HARRANS: tí hann fór og dvaldist við áarløkin Chē´-rĭth, sum *er* frammanfyri Jordan.
6 Og ravnarnir førdu honum breyð og kjøt um morgunin, og breyð og kjøt um kvøldið; og hann drakk úr áarløkinum.
7 Og tað bar á eftir eina tíð, at áarløkurin tornaði upp, av tí at tað hevði einkið regn verið í landinum.
8 ¶ Og HARRANS orð kom at honum, sigandi,
9 Reis *teg,* slepp tær til Zăr´-ĕ-phâth, sum *hoyrir* til Zī´-dŏn, og dvølst har: sí, eg havi skipað eini einkjukvinnu har at uppihalda tær.
10 So hann reistist og fór til Zăr´-ĕ-phâth. Og tá ið hann kom til staðarportrið, sí, einkjukvinnan savnaði har av greinum: og hann kallaði til hennara, og segði, Heinta mær, eg biði teg, eitt sindur av vatni í eitt ker, at eg má drekka.
11 Og sum hon fór at heinta *tað,* kallaði hann til hennara, og segði, Ber mær, eg biði teg, ein bita av breyði í hond tíni.
12 Og hon segði, *Sum* HARRIN Guð tín livir, eg havi ikki eina køku, men ein neva av mjøli í einum stólpa, og eitt sindur av olju í eini krukku: og sí, eg savni tvær greinar, at eg má fara inn og tilreiða tað til mín og sonar míns, at vit mega eta tað, og doyggja.
13 Og Ê-lī´-jăh segði við hana,

Óttast ikki; far *og* ger sum tú hevurt sagt: men ger mær harúr eina lítla køku fyrst, og ber *hana* at mær, og síðan ger til tín og til sonar tíns.

14 Tí at svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Stólpin av mjøli skal ikki svinna, eiheldur skal krukkan av olju bila, inntil dagin *ið* HARRIN sendir regn uppá jørðina.

15 Og hon fór og gjørdi samsvarandi við framsøgn Ê-lí´-jäh: og hon, og hann, og hús hennara, ótu *mangar* dagar.

16 *Og* stólpin av mjøli svann ikki, eiheldur bilaði krukkan av olju, samsvarandi við HARRANS orð, sum hann talaði viðˆ Ê-lí´-jäh.

17 ¶ Og tað bar á eftir hesi tingini, *at* sonurin hjá kvinnuni, matmóðrini av húsinum, fell sjúkur; og hansara sjúkdómur var so svárur, at tað var eingin andadráttur eftir í honum.

18 Og hon segði við Ê-lí´-jäh, Hvat havi eg at gera við teg, Ó tú Guðs maður? ert tú komin at mær til at kalla mína synd til endurminningar, og til at vega son mín?

19 Og hann segði við hana, Gev mær son tín. Og hann tók hann út úr føvningi hennara, og bar hann upp í eitt loft, har hann dvaldi, og legði hann uppá egnu song sína.

20 Og hann rópti á HARRAN, og segði, O HARRI Guð mín, hevurt tú eisini fört ilt uppá einkjuna, hjá hvørji eg útisiti, við at vega son hennara?

21 Og hann strekti seg omanyvir barnið tríggjar ferðir, og rópti á HARRAN, og segði, O HARRI Guð mín, eg biði teg, lat sálina hjá hesum barni koma inn í hann aftur.

22 Og HARRIN hoyrdi røddina hjá Ê-lí´-jäh; og sálin hjá barninum kom inn í hann aftur, og hann livnaði aftur.

23 Og Ê-lí´-jäh tók barnið, og førdi hann oman úr kamarinum inn í húsið, og flýggjaði móður hansara hann: og Ê-lí´-jäh segði, Sí, sonur tín livir.

24 ¶ Og kvinnan segði til Ê-lí´-jäh, Nú, av hesum, veit eg, at tú *ert* ein Guðs maður, *og* at orð HARRANS í munni tínum *er* sannleiki.

KAPITUL 18

OG tað bar á *eftir* mangar dagar, at orð HARRANS kom til Ê-lí´-jäh í tí triðja árinum, sigandi, Far, sýn teg at Áhabi; og eg vil senda regn uppá jørðina.

2 Og Ê-lí´-jäh fór at sýna seg at Áhabi. Og *tað var* ein svár hungursneyð í Sä-mâr´-j-ŭ.

3 Og Áhab rópaði Ó-bä-dí´-äh, sum *var* stjórnari húss *hansara*. (Nú, Ó-bä-dí´-äh óttaðist HARRAN stórliga:

4 Tí at tað varð *so,* tá ið Jëz´-ë-bël skar av prophetar HARRANS, at Ó-bä-dí´-äh tók eitt hundrað prophetar, og fjaldi teir viðˆ fimti í einum helli, og føddi teir við breyði og vatni.)

5 Og Áhab segði við Ó-bä-dí´-äh, Far inn í landið, at øllum keldum av vatni, og at øllum áarløkum: vera má, *at* vit mega finna gras til at bjarga hestunum og múldjórunum á lívi, at vit missi ikki øll djórini.

6 So teir býttu landið ímillum sín til at fara út ígjøgnum tað: Áhab fór ëin veg fyri seg sjálvan, og Ó-bä-dí´-äh fór ein annan veg fyri seg sjálvan.

7 ¶ Og sum Ó-bä-dí´-äh var á veginum, sí, Ê-lí´-jäh møtti honum: og hann kendi hann, og fell á andlit sítt, og segði, *Ert* tú hasin harri mín Ê-lí´-jäh?

8 Og hann svaraði honum, Eg *eri:* far, sig harra tínum, Sí, Ê-lí´-jäh *er her.*

9 Og hann segði, Hvat havi eg

syndað, at tú vildirt flýggjað tænara tín inn í hond Áhabs, til at bana mær?

10 *Sum* HARRIN Guð tín livir, tað er eingin tjóð ella kongadømi, hvagar harri mín ikki hevur sent at søkja teg: og tá ið teir søgdu, *Hann er* ikki *har;* tók hann ein eið av kongadøminum og tjóðini, at teir funnu teg ikki.

11 Og nú sigurt tú, Far, sig harra tínum, Sí, Ê-lī´-jăh *er her.*

12 Og tað skal bera á, *so skjótt sum* eg eri farin frá tær, at Andi HARRANS skal bera teg hvagar eg veit ikki; og *so* tá ið eg komi og sigi Áhabi, og hann kann ikki finna teg, skal hann vega meg: men eg, tænari tín, óttist HARRAN frá ungdómi mínum.

13 Varð tað ikki sagt harra mínum hvat eg gjørdi, tá ið Jĕz´-ĕ-bĕl vá prophetar HARRANS, hvussu eg fjaldi eitt hundrað menn av prophetum HARRANS við^ fimti í einum helli, og føddi teir við breyði og vatni?

14 Og nú sigurt tú, Far, sig harra tínum, Sí, Ê-lī´-jăh *er her:* og hann skal vega meg.

15 Og Ê-lī´-jăh segði, *Sum* HARRI herliðanna livir, frammi fyri hvørjum eg standi, eg vil vissuliga sýna meg at honum í dag.

16 So Ó-bă-dī´-ăh fór at hitta Áhab, og segði honum frá: og Áhab fór at hitta Ê-lī´-jăh.

17 ¶ Og tað bar á, tá ið Áhab sá Ê-lī´-jăh, at Áhab segði við hann, *Ert* tú hann sum órógvar Ísrael?

18 Og hann svaraði, Eg havi ikki órógvað Ísrael; men tú, og hús faðirs tíns, í at tit hava yvirgivið boðini hjá HARRANUM, og tú hevurt fylgt Bā´-ă-līm.

19 Nú tessvegna send, *og* savna til mín allan Ísrael at Carmel fjalli, og prophetar Bā´-ăl-s fýra hundrað og fimti, og prophetar lundanna fýra hundrað, sum eta við borð Jĕz´-ĕ-bĕl-ar.

20 So Áhab sendi at øllum børnum Ísraels, og savnaði prophetarnar saman at Carmel fjalli.

21 Og Ê-lī´-jăh kom at øllum fólkinum, og segði, Hvussu leingi halta tit ímillum tvær meiningar? um HARRIN *veri* Guð, fylgið honum: men um Bā´-ăl, *tá* fylgið honum. Og fólkið svaraði honum ikki eitt orð.

22 Tá segði Ê-lī´-jăh við fólkið, Eg, *enntá* eg einans, eri verðandi ein prophetur HARRANS; men Bā´-ăl-s prophetar *eru* fýra hundrað og fimti menn.

23 Latið teir tí geva okkum tveir ungtarvar; og latið teir velja ĕin ungtarv til sín sjálvs, og skera hann í stykkir, og leggja *hann* á við^, og ongan eld seta *undir:* og eg vil tilreiða hīn ungtarvin, og leggja *hann* á við^, og ongan eld seta *undir:*

24 Og kallið tit á navnið á gudum tykkara, og eg vil kalla á navn HARRANS: og tann Guð, sum svarar við^ eldi, latið hann vera Guð. Og alt fólkið svaraði og segði, Tað er væl talað.

25 Og Ê-lī´-jăh segði við prophetar Bā´-ăl-s, Veljið tykkum ĕin ungtarv til tykkara sjálvs, og tilreiðið *hann* fyrst; tí at tit *eru* mangir; og kallið á navnið á gudum tykkara, men setið ongan eld *undir.*

26 Og teir tóku ungtarvin, sum var givin teimum, og teir tilreiddu *hann,* og kallaðu á navnið á Bā´-ăl-i frá morgni enntá inntil middag, sigandi, O Bā´-ăl, hoyr okkum. Men *har var* eingin rødd, ella nakar sum svaraði. Og teir lupu uppá altarið sum var gjørt.

27 Og tað bar á við middag, at Ê-lī´-jăh háðaði teir, og segði, Geylið hart: tí hann *er* ein gudur; annaðhvørt er hann talandi, ella er hann eltandi, ella er hann á eini ferð, *ella* vera má hann svevur, og má verða vaktur.

28 Og teir rópaðu hart, og skóru seg sjálvar eftir háttarlagi sínum við knívum og skurðknívum, til blóðið goysti út uppá teir.
29 Og tað bar á, tá ið middagur var liðin, og teir prophēteraðu inntil *tíðina* av ofringini av *kvøld*-sláturofrinum, at *har var* hvørki rødd, ella nakar at svara, ella nakar sum gav gætur.
30 Og Ê-lī´-jāh segði við alt fólkið, Komið nær at mær. Og alt fólkið kom nær at honum. Og hann vældi um altar HARRANS, *sum var* brotið niður.
31 Og Ê-lī´-jāh tók tólv steinar, samsvarandi við talið á ættargreinum Jákobs sona, at hvørjum HARRANS orð kom, sigandi, Ísrael skal navn títt vera:
32 Og við steinunum bygdi hann eitt altar í navni HARRANS: og hann gjørdi eina veit kring altarið, so stóra sum vildi innihildið tvey mát av sáði.
33 Og hann setti viðin til rættis, og skar ungtarvin í stykkir, og legði *hann* á viðin, og segði, Fyllið fýra tunnur við vatni, og hellið *tað* á brenni-sláturofrið, og á viðin.
34 Og hann segði, Gerið *tað* aðru ferðina. Og teir gjørdu *tað* aðru ferðina. Og hann segði, Gerið *tað* triðju ferðina. Og teir gjørdu *tað* triðju ferðina.
35 Og vatnið rann runt um altarið; og hann fylti veitina eisini við vatni.
36 Og tað bar á við *tíðina av* ofringini av *kvøld*-sláturofrinum, at Ê-lī´-jāh prophētur kom nær, og segði, HARRI Guð Ábrahams, Ísaaks, og Ísraels, lat tað verða kunnugt henda dag, at tú *ert* Guð í Ísrael, og *at* eg *eri* tænari tín, og *at* eg havi gjørt øll hesi ting eftir orði tínum.
37 Hoyr meg, O HARRI, hoyr meg, at hetta fólk má vita, at tú *ert* HARRIN Guð, og *at* tú hevurt vent hjarta teirra aftur aftur.
38 Tá fell eldur HARRANS, og upptærdi brenni-sláturofrið, og viðin, og steinarnar, og dustið, og sleikti upp vatnið sum *var* í veitini.
39 Og tá ið alt fólkið sá *tað*, fullu tey á andlit síni: og tey søgdu, HARRIN, hann *er* Guð˜; HARRIN, hann *er* Guð˜.
40 Og Ê-lī´-jāh segði við tey, Takið prophētar Bā´-ăl-s; latið ikki ēin av teimum komast undan. Og teir tóku teir: og Ê-lī´-jāh førdi teir oman til áarløkin Kī´-sjön, og vó teir har.
41 ¶ Og Ê-lī´-jāh segði við Áhab, Slepp tær niðan, et og drekk; tí at *tað er* eitt ljóð av yvirflóð av regni.
42 So Áhab fór niðan at eta og at drekka. Og Ê-lī´-jāh fór niðan til toppin av Carmel; og hann kastaði seg niður uppá jørðina, og setti andlit sítt ímillum knø síni,
43 Og segði til tænara sín, Far niðan nú, hygg ímóti sjónum. Og hann fór niðan, og hugdi, og segði, *Har er* einkið. Og hann segði, Far aftur sjey ferðir.
44 Og tað bar á við ta sjeyndu ferðina, at hann segði, Sí, tað reisist eitt lítið skýggj úr sjónum, líka *sum* ein manshond. Og hann segði, Far niðan, sig við Áhab, Fyrireika *vagn tín*, og slepp tær oman, at regnið steðgi tær ikki.
45 Og tað bar á í millumtíðini, at himinin varð svartur við skýggjum og vindi, og har varð eitt mikið regn. Og Áhab reið, og fór til Jĕz´-rē̆el.
46 Og hond HARRANS var á Ê-lī´-jāh; og hann gyrdi upp lendar sínar, og rann undan Áhab til inngongd Jĕz´-rē̆el-s.

KAPITUL 19

OG Áhab segði Jĕz´-ĕ-bĕl-i alt sum Ê-lī´-jāh hevði gjørt, og hartil hvussu hann hevði vigið allar prophētarnar við svørðinum.

2 Tá sendi Jĕz´-ĕ-bĕl ein sendiboða til Ê-lī´-jăh, sigandi, Soleiðis lat gudarnar gera *við meg,* og meira við, um eg geri ikki lív títt sum lívið hjá ēinum av teimum fyri í morgin um hesa tíð.

3 Og tá ið hann sá *tað,* reistist hann, og fór fyri sítt lív, og kom til Bēēr´-sjĕ-bŭ, sum *hoyrir* til Judah, og eftirlæt tænara sín har.

4 ¶ Men sjálvur hann fór eina dagsferð inn í oyðuna, og kom og settist niður undir einum einiberjatræi: og hann fyrispurdi fyri seg sjálvan, at hann mátti doyð; og segði, Tað er nóg mikið; nú, O HARRI, tak burtur lív mítt; tí at eg *eri* ikki frægari enn fedrar mínir.

5 Og sum hann lá og svav undir einum einiberjatræi, sí, tá nam ein eingil við hann, og segði við hann, Reis *teg og* et.

6 Og hann hugdi, og sí, *har var* ein køka, bakað á kolunum, og ein krukka av vatni við høvur hansara. Og hann át og drakk, og legði seg niður aftur.

7 Og eingil HARRANS kom aftur aðru ferðina, og nam við hann, og segði, Reis *teg og* et; av tí at ferðin *er* ov mikil hjá tær.

8 Og hann reistist, og át og drakk, og fór í styrkini av tí matinum fjøruti dagar og fjøruti nætur at Hór´-ĕb, fjalli Guðs.

9 ¶ Og hann kom hagar at einum helli, og helt til har; og sí, orð HARRANS *kom* til hansara, og hann segði við hann, Hvat gert tú her, Ê-lī´-jăh?

10 Og hann segði, Eg havi verið sera ástbrellin vegna HARRANS Guðs herliðanna: tí at børn Ísraels hava yvirgivið sáttmála tín, kastað niður altar tíni, og vigið prophetar tínar við svørðinum; og eg, *enntá* eg einans, eri eftir; og teir søkja mítt lív, at taka tað burtur.

11 Og hann segði, Far fram, og statt uppiá fjallinum frammi fyri HARRANUM. Og sí, HARRIN fór framvið, og ein mikil og sterkur vindur skræddi fjøllini, og breyt í stykkir klettarnar frammanfyri HARRANUM; *men* HARRIN *var* ikki í vindinum: og aftaná vindin ein jarðskjálvti; *men* HARRIN *var* ikki í jarðskjálvtanum:

12 Og aftaná jarðskjálvtan ein eldur; *men* HARRIN *var* ikki í eldinum: og aftaná eldin ein still, smá rødd.

13 Og tað varð *so,* tá ið Ê-lī´-jăh hoyrdi *hana,* at hann ballaði andlit sítt í kappa sín, og fór út, og stóð í innfaringini inn av hellinum. Og sí, *tað kom* ein rødd at honum, og segði, Hvat gert tú her, Ê-lī´-jăh?

14 Og hann segði, Eg havi verið sera ástbrellin vegna HARRANS Guðs herliðanna: av tí at børn Ísraels hava yvirgivið sáttmála tín, kastað niður altar tíni, og vigið prophetar tínar við svørðinum; og eg, *enntá* eg einans, eri eftir; og teir søkja mítt lív, at taka tað burtur.

15 Og HARRIN segði við hann, Far, vend aftur á vegi tínum til oyðu Damascusar: og tá ið tú kemurt, salva Hā´-zā-ĕl *til at vera* kong yvir Sýriu:

16 Og Jehu Nimsjī-s son skalt tú salva *til at vera* kong yvir Ísrael: og Ê-lī´-sjă Sjá´-phăt-s son úr Á´-bĕl-mĕ-hó´-lăh skalt tú salva *til at vera* prophet í títt rúm.

17 Og tað skal bera á, *at* hann, sum kemst undan svørði Hā´-zā-ĕl-s, skal Jehu vega: og hann, sum kemst undan frá svørði Jehu-s, skal Ê-lī´-sjă vega.

18 Tó havi eg eftirlatið *mær* sjey túsund í Ísrael; øll tey knø, sum hava ikki boygt at Bā´-ăl-i, og hvønn munn sum hevur ikki kyst hann.

19 ¶ So hann fór avstað hað-

ani, og fann Ê-lĭ´-sjă Sjá´-phăt-s son, hvør *var* pløgandi *við* tólv okum *av oksum* frammanfyri sær, og hann hjá tí tólvta: og Ê-lĭ´-jăh fór framvið honum, og kastaði sín kappa uppá hann.

20 Og hann eftirlæt oksarnar, og rann eftir Ê-lĭ´-jăh, og segði, Lat meg, eg biði teg, kyssa faðir mín og móður mína, og *so* vil eg fylgja tær. Og hann segði við hann, Far tilbakar aftur: tí at hvat havi eg gjørt við teg?

21 Og hann vendi aftur tilbakar frá honum, og tók eitt ok av oksum, og vó teir, og kókaði kjøt teirra við amboðum oksanna, og gav innat fólkinum, og tey ótu. Síðan reistist hann, og fór aftaná Ê-lĭ´-jăh, og tænti at honum.

KAPITUL 20

OG Bĕn-há´-dăd, kongurin av Sýriu, savnaði alt herlið sítt saman: og *tað vóru* tríati og tveir kongar við honum, og hestar, og vagnar: og hann fór niðan og kringsetti Să-mâr´-ĭ-ŭ, og kríggjaði ímóti tí.

2 Og hann sendi sendiboðar til Áhabs kongs av Ísrael inn í staðin, og segði við hann, Svá sigur Bĕn-há´-dăd,

3 Silvur títt og gull títt *er* mítt; konur tínar eisini og børn tíni, *enntá* hini stásiligastu, *eru* míni.

4 Og kongurin av Ísrael svaraði og segði, Mín harri, O kongur, samsvarandi við framsøgn tína, eg *eri* tín, og alt sum eg havi.

5 Og sendiboðarnir komu aftur, og søgdu, Svá talar Bĕn-há´-dăd, sigandi, Tó *at* eg havi sent at tær, sigandi, Tú skalt flýggja mær silvur títt, og gull títt, og konur tínar, og børn tíni;

6 Tó vil eg senda sendiboðar mínar at tær í morgin um hesa tíð, og teir skulu kanna hús títt, og húsini hjá tænarum tínum; og tað skal verða, *at* hvatsumhelst *ið* er dámligt í eygum tínum, teir skulu koyra *tað* í hond sína, og taka *tað* burtur.

7 Tá kallaði kongur Ísraels allar hinar elstu landsins, og segði, Merkið *tykkum,* eg biði tykkum, og síggið hvussu hesin *maðurin* søkir mein: tí hann sendi at mær eftir konum mínum, og eftir børnum mínum, og eftir silvuri mínum, og eftir gulli mínum; og eg sýtti honum ikki.

8 Og allir teir elstu og alt fólkið søgdu við hann, Gev ikki gætur *at honum,* ella samtykk.

9 Hvørsvegna hann segði við sendiboðarnar hjá Bĕn-há´-dăd-i, Sigið harra mínum konginum, Alt, sum tú sendirt eftir til tænara tíns í fyrstani, vil eg gera: men hetta tingið má eg ikki gera. Og sendiboðarnir fóru avstað, og bóru honum orð aftur.

10 Og Bĕn-há´-dăd sendi at honum, og segði, Soleiðis geri mær gudarnir, og meira við, um dustið av Să-mâr´-ĭ-ŭ skal *vera* nóg mikið til krummur hjá øllum fólkinum, sum fylgja mær.

11 Og kongurin av Ísrael svaraði og segði, Sigið *honum,* Lat ikki hann, sum gyrðir á *brynju sína,* rósa sær sum hann, sum tekur hana av.

12 Og tað bar á, tá ið *Bĕn-há´-dăd* hoyrdi henda boðskap, sum hann drakk, hann og kongarnir í tjaldbúðunum, at hann segði við tænarar sínar, Stillið *tykkum í uppstilling.* Og teir stillaðu *seg í uppstilling* ímóti staðinum.

13 ¶ Og sí, tað kom ein prophetur at Áhab kongi av Ísrael, sigandi, Svá sigur HARRIN, Hevurt tú sæð alla hesa miklu mannfjøld? sí, eg vil flýggja hana inn í hond tína henda dag; og tú skalt vita, at eg *eri* HARRIN.

14 Og Áhab segði, Við^ hvørjum[p]? Og hann segði, Svá sigur HARRIN, *Enntá* við^ teimum ungu

monnunum hjá prinsunum av fylkjunum. Tá segði hann, Hvør skal skipa bardagan? Og hann svaraði, Tú.

15 Tá upptaldi hann teir ungu menninar hjá prinsunum av fylkjunum, og teir vóru tvey hundrað og tríati tveir: og aftaná teir upptaldi hann alt fólkið, *enntá* øll børn Ísraels, *verandi* sjey túsund.

16 Og teir fóru út við middag. Men Bĕn-há´-dăd *var í ferð við at* drekka seg druknan í tjaldbúðunum, hann og kongarnir, teir tríati og tveir kongarnir sum hjálptu honum.

17 Og teir ungu menninir hjá prinsunum av fylkjunum fóru út fyrst; og Bĕn-há´-dăd sendi út, og teir taldu honum, sigandi, Tað eru menn komnir út úr Sămâr´-ĭ-ŭ.

18 Og hann segði, Hvørt teir veri komnir út til frið, takið teir livandi; ella hvørt teir veri komnir út til orrustu, takið teir livandi.

19 So hesir ungu menninir hjá prinsunum av fylkjunum komu út úr staðinum, og herurin sum fylgdi teimum.

20 Og teir vógu hvør *og* ēin mann sín: og Sýriulendingarnir flýddu; og Ísrael elti teir: og Bĕn-há´-dăd, kongurin av Sýriu, komst undan á einum hesti við hestmonnunum.

21 Og kongurin av Ísrael fór út, og sló hestarnar og vagnarnar, og vó Sýriulendingarnar við eini miklari slátran.

22 ¶ Og propheturin kom til kongs Ísraels, og segði við hann, Far, styrk teg, og merk *tær,* og síggj hvat tú gert: tí við endurkomu ársins vil kongurin av Sýriu koma upp ímóti tær.

23 Og tænararnir hjá konginum av Sýriu søgdu við hann, Teirra gudar *eru* gudar av heyggjunum; tí vóru teir sterkari enn vit; men latum okkum berjast ímóti teimum í slættanum, og vissuliga skulu vit vera sterkari enn teir.

24 Og ger henda lut, Tak kongarnar burtur, hvønn mann út úr plássi hans, og set høvuðsmenn í teirra rúmˇ:

25 Og upptel tær ein her, líka *sum* herurin sum tú hevurt mist, hest fyri hest, og vagn fyri vagn: og vit vilja berjast ímóti teimum í slættanum, *og* vissuliga skulu vit vera sterkari enn teir. Og hann lýddi á rødd teirra, og so gjørdi.

26 Og tað bar á við endurkomu ársins, at Bĕn-há´-dăd upptaldi Sýriulendingarnar, og fór upp til Ā´-phĕk, at berjast ímóti Ísrael.

27 Og børn Ísraels vórðu upptaldir, og vóru allir tilstaðar, og fóru ímóti teimum: og børn Ísraels slógu upp frammanfyri teimum líka *sum* tvey lítil fylgir av geitalombum; men Sýriulendingarnir fyltu landið.

28 ¶ Og tað kom ein Guðs maður, og talaði yvirat kongi Ísraels, og segði, Svá sigur HARRIN, Av tí at Sýriulendingarnir hava sagt, HARRIN *er* Guð av heyggjunum, men hann *er* ikki Guð av dølunum, tí vil eg flýggja alla hesa miklu fjøld inn í hond tína, og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

29 Og teir slógu upp ēin yvir av hīnum sjey dagar. Og *soleiðis* varð tað, at á tí sjeynda deginum varð orrustan sameinað: og børn Ísraels vógu av Sýriulendingunum hundrað túsund fótmenn í ēinum degi.

30 Men restin flýddi til Ā´-phĕk, inn í staðin; og *har* fell ein múrur omanyvir tjúgu og sjey túsund av monnunum *sum vóru* eftir. Og Bĕn-há´-dăd flýddi, og kom inn til staðarins, inn í eitt innara kamar.

31 ¶ Og hansara tænarar søgdu við hann, Sí nú, vit hava hoyrt, at

kongarnir av húsi Ísraels *eru* miskunnarfullir kongar: lat okkum, eg biði teg, koyra sekkjaklæði á lendar várar, og togendar uppá høvur vári, og fara út til kongs Ísraels: vera má, *at* hann vil frelsa lív títt.

32 So teir gyrdu sekkjaklæði á lendar sínar, og *koyrdu* reipˇ á høvur síni, og komu til kongs Ísraels, og søgdu, Tín tænari, Bĕn-há´dăd, sigur, Eg biði teg, lat meg liva. Og hann segði, *Er* hann enn á lívi? hann *er* bróðir mín.

33 Nú, menninir dúgliga eygleiddu, hvørt *nakað ting fór at koma* frá honum, og skundisliga fangaðu *tað:* og teir søgdu, Tín bróðir, Bĕn-há´dăd. Tá segði hann, Farið tit, førið hann. Tá kom Bĕn-há´dăd fram til hansara; og hann voldi honum at koma upp í vagnin.

34 Og *Bĕn-há´dăd* segði við hann, Staðirnar, sum faðir mín tók frá faðir tínum, vil eg endurbøta; og tú skalt gera strætir til tín í Damascus, eins og faðir mín gjørdi í Să-mâr´-ĭ-ŭ. Tá *segði Áhab,* Eg vil senda teg avstað við hesum sáttmála. So hann gjørdi ein sáttmála við hann, og sendi hann avstað.

35 ¶ Og ein ávísur maður av prop<u>h</u>eta-sonunum segði við næsta sín í orði HARRANS, Slá meg, eg biði teg. Og maðurin sýtti at slá hann.

36 Tá segði hann við hann, Av tí at tú hevurt ikki lýtt rødd HARRANS, sí, so skjótt sum tú ert farin avstað frá mær, skal ein leyva vega teg. Og so skjótt sum hann var farin avstað frá honum, fann ein leyva hann, og vá hann.

37 Tá fann hann ein annan mann, og segði, Slá meg, eg biði teg. Og maðurin sló hann, so at, í at sláa, særdi hann *hann.*

38 So prop<u>h</u>eturin fór avstað, og bíðaði eftir kongi við vegin, og dulbúði seg við øskum uppiá andliti sínum.

39 Og sum kongurin fór framvið, rópaði hann á kong: og hann segði, Tín tænari fór út í miðjan bardagan; og sí, ein maður vendi til viks, og førdi ein mann at mær, og segði, Varða henda mann: um við nøkrum brøgdum hann verði vantandi, tá skal lív títt vera fyri lív hansara, ella annars skalt tú gjalda eina talent av silvuri.

40 Og sum tín tænari var upptikin her og har, var hann farin. Og kongurin av Ísrael segði við hann, So *skal* dómur tín *vera;* tú sjálvur hevurt avgjørt *hann.*

41 Og hann skundaði *sær,* og tók øskurnar burtur frá andliti sínum; og kongur Ísraels greinaði hann, at hann *var* av prop<u>h</u>etunum.

42 Og hann segði við hann, Svá sigur HARRIN, Av tí at tú hevurt latið fara út úr hond *tíni* ein mann, hvønn eg útnevndi at framsiga oyðing, tí skal lív títt fara fyri lív hansara, og fólk títt fyri fólk hansara.

43 Og kongurin av Ísrael fór til hús sítt tungur og misnøgdur, og kom til Să-mâr´-ĭ-ŭ.

KAPITUL 21

OG tað bar á eftir hesi ting, *at* Náboth Jĕz-rē´ĕl-ĭt´-i hevði ein víngarð, sum *var* í Jĕz´-rĕel, tætt við slottið hjá Áhab kongi av Să-mâr´-ĭ-ŭ.

2 Og Áhab talaði við Náboth, sigandi, Gev mær víngarð tín, at eg má hava hann til ein garð av urtum, av tí at hann *er* nær at húsi mínum: og eg vil geva tær fyri hann ein betri víngarð enn hann; *ella,* um tað tyki gott fyri tær, vil eg geva tær virðið á honum í peningi.

3 Og Náboth segði til Áhabs, HARRIN sýti tað mær, at eg skuldi givið arv fedra mína at tær.
4 Og Áhab kom inn í hús sítt tungur og misnøgdur uppá grund av orðinum sum Náboth Jez-reel-ít-i hevði talað til hansara: tí at hann hevði sagt, Eg vil ikki geva tær arv fedra mína. Og hann legði seg niður uppá song sína, og vendi burtur andlit sítt, og vildi einkið breyð eta.
5 ¶ Men Jez-é-bel, kona hansara, kom til hansara, og segði við hann, Hví er tín andi so dapur, at tú einkið breyð eturt?
6 Og hann segði við hana, Av tí at eg talaði við Náboth Jez-reel-ít-a, og segði við hann, Gev mær víngarð tín fyri pening; ella annars, um tað hóvi tær, vil eg geva tær *ein annan* víngarð fyri hann: og hann svaraði, Eg vil ikki geva tær víngarð mín.
7 Og Jez-é-bel, kona hansara, segði við hann, Stjórnart tú nú kongadømi Ísraels? reis *teg, og* et breyð, og lat títt hjarta vera kátt: eg vil geva tær víngarð Náboths Jez-reel-ít-a.
8 So hon skrivaði brøv í navni Áhabs, og innsiglaði *tey* við innsigli hans, og sendi brøvini at hinum elstu og til aðalsmannanna, sum *vóru* í staði hansara, dvøljandi við Nábothi.
9 Og hon skrivaði í brøvunum, sigandi, Yvirlýsið eina føstu, og setið Náboth til hæddar millum fólksins:
10 Og stillið tveir menn, Bé-lí-ál-s synir, frammanfyri hann, at bera vitni ímóti honum, sigandi, Tú Guðsspottaðirt Guð og kong. Og *so* berið hann út, og steinið hann, at hann má doyggja.
11 Og menninir úr staði hansara, *enntá* hinir elstu og aðalsmenninir sum vóru íbúgvar í staði hansara, gjørdu sum Jez-é-bel hevði sent at teimum, *og* sum tað *stóð* skrivað í brøvunum sum hon hevði sent at teimum.
12 Teir yvirlýstu eina føstu, og settu Náboth til hæddar millum fólksins.
13 Og tað komu inn tveir menn, Bé-lí-ál-s børn, og sótu frammanfyri honum: og Bé-lí-ál-s menninir vitnaðu ímóti honum, *enntá* ímóti Nábothi, í nærveru fólksins, sigandi, Náboth Guðsspottaði Guð og kong. So bóru teir hann fram út úr staðinum, og steinaðu hann við steinum, at hann doyði.
14 So sendu teir til Jez-é-bel-ar, sigandi, Náboth er steinaður, og er deyður.
15 ¶ Og tað bar á, tá ið Jez-é-bel hoyrdi at Náboth var steinaður, og var deyður, at Jez-é-bel segði til Áhabs, Reis *teg,* tak til ognar víngarð Náboths Jez-reel-ít-a, sum hann noktaði at geva tær fyri pening: tí at Náboth er ikki á lívi, men deyður.
16 Og tað bar á, tá ið Áhab hoyrdi at Náboth var deyður, at Áhab reis upp til at fara oman til víngarð Náboths Jez-reel-ít-a, at taka hann til ognar.
17 ¶ Og HARRANS orð kom til É-lí-jah Tísj-bít-a, sigandi,
18 Reis *teg,* far oman at møta Áhab kongi av Ísrael sum *er* í Sa-már-í-u: sí, *hann er* í víngarði Náboths, hvagar hann er farin oman at ognast hann.
19 Og tú skalt tala innat honum, sigandi, Svá sigur HARRIN, hevurt tú dripið, og eisini tikið *til* ognar? Og tú skalt tala innat honum, sigandi, Svá sigur HARRIN, Í tí plássi, har hundar sloktu blóðið á Nábothi, skulu hundar sleikja blóð títt, enntá títt.
20 Og Áhab segði til É-lí-jah, hevurt tú funnið meg, O fíggindi mín? Og hann svaraði, Eg havi funnið *teg:* av tí at tú hevurt selt teg sjálvan til at virka ilt í eygsjón HARRANS.

21 Sí, eg vil føra ilt omanyvir teg, og vil taka burtur eftirkoming tína, og vil skera av frá Áhabi hann sum mígur ímóti vegginum, og hann sum er lokaður inni og eftirlatin í Ísrael,

22 Og vil gera hús títt líka *sum* hús Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nē´-băt-s sonar, og líka *sum* hús Bā-ăsj´-ă Á´-hī-jăh sonar, fyri tirringina, við hvørji tú hevurt tirrað *meg* til firtnis, og fingið Ísrael at synda.

23 Og um Jĕz´-ĕ-bĕl eisini talaði HARRIN, sigandi, Hundarnir skulu eta Jĕz´-ĕ-bĕl við Jĕz´-rēēl-s múr.

24 Hann, sum doyr hjá Áhab í staðinum, skulu hundarnir eta; og hann, sum doyr í akrinum, skulu fuglar luftarinnar eta.

25 ¶ Men tað var eingin líkur Áhabi, sum seldi seg sjálvan til at virka vondsku í eygsjón HARRANS, hvønn Jĕz´-ĕ-bĕl, kona hansara, østi upp.

26 Og hann gjørdi sera andstyggiligani í at fylgja avgudum, samsvarandi við øll *ting* eins og Amoritarnir gjørdu, hvørjar HARRIN kastaði út frammi fyri børnum Ísraels.

27 Og tað bar á, tá ið Áhab hoyrdi hasi orðini, at hann skræddi klæðir síni, og koyrdi sekkjaklæði uppá kjøt sítt, og fastaði, og lá í sekkjaklæði, og fór ljódligani.

28 Og HARRANS orð kom til Ê-lī´-jăh Tīsj-bīt´-a, sigandi,

29 Sært tú hvussu Áhab eyðmýkir seg sjálvan frammi fyri mær? av tí at hann eyðmýkir seg sjálvan frammi fyri mær, vil eg ikki koma við tí illa á døgum hans: *men* á døgum sonar hansara vil eg koma við tí illa omanyvir hús hans.

KAPITUL 22

OG teir hildu áfram trý ár uttan kríggj ímillum Sýriu og Ísrael.

2 Og tað bar á í tí triðja árinum, at Jĕ-hō´-sjâ-phăt, kongurin av Judah, kom oman til kongsins av Ísrael.

3 Og kongurin av Ísrael segði við tænarar sínar, Vita tit, at Rá´-mōth í Gilead *er* okkara, og vit *veri* stillir, *og* taka tað ikki út úr hondini á konginum av Sýriu?

4 Og hann segði við Jĕ-hō´-sjâ-phăt, Vilt tú fara við mær til orrustu til Rá´-mōth-gī´-lĕ-ăd? Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði til kongsins av Ísrael, Eg *eri* sum tú *ert*, fólk mítt sum fólk títt, hestar mínir sum hestar tínir.

5 Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði við kongin av Ísrael, Fregna, eg biði teg, hjá orði HARRANS í dag.

6 Tá savnaði kongurin av Ísrael prophetarnar saman, umleið fýra hundrað menn, og segði við teir, Skal eg fara ímóti Rá´-mōth-gī´-lĕ-ăd til orrustu, ella skal eg lata vera? Og teir søgdu, Far upp; tí at Harrin skal flýggja *tað* inn í hondina á kongi.

7 Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði, *Er tað* ikki her ein prophetur HARRANS umframt, at vit máttu fregnað av honum?

8 Og kongurin av Ísrael segði við Jĕ-hō´-sjâ-phăt, *Tað er* enn ēin maður, Mī-caī´-ăh, sonur Ĭm´-lâh, við hvørjum vit mega fregna av HARRANUM: men eg hati hann; tí at hann propheterar ikki gott viðvíkjandi mær, men ilt. Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði, Lat ikki kong siga so.

9 Tá kallaði kongurin av Ísrael ein yvirmann, og segði, Skunda *higar* Mī-caī´-ăh, son Ĭm´-lâh.

10 Og kongurin av Ísrael og Jĕ-hō´-sjâ-phăt, kongurin av Judah, sótu hvør á sínum hásæti, havandi farið í skikkjur sínar, í einum tómum plássi í inngongdini av portrinum av Să-mâr´-ī-ŭ; og allir prophetarnir propheteraðu frammi fyri teimum.

11 Og Zĕd-ĕ-kī´-ăh Chĕ-ná´-ă-năh sonur gjørdi sær horn̆ av jarni: og hann segði, Svá sigur HARRIN, Við hesum skalt tú trýsta Sýriulendingarnar, inntil tú havi uppslúkað teir.

12 Og allir prophetarnir propheteraðu soleiðis, sigandi, Far upp til Rá´-möth-gī´-lĕ-ăd, og framgakk: tí at HARRIN skal flýggja *tað* inn í kongsins hond.

13 Og sendiboðin, sum var farin at kalla Mī-caĭ´-ăh, talaði við hann, sigandi, Sí nú, orðini hjá prophetunum *kunngera* gott at kongi við ĕinum munni: lat orð títt, eg biði teg, vera líka *sum* orðið hjá ĕinum av teimum, og tala *tað sum er* gott.

14 Og Mī-caĭ´-ăh segði, *Sum* HARRIN livir, hvat HARRIN sigur við meg, tað vil eg tala.

15 ¶ So hann kom til kongsins. Og kongur segði við hann, Mī-caĭ´-ăh, skulu vit fara ímóti Rá´-möth-gī´-lĕ-ăd til orrustu, ella skulu vit lata vera? Og hann svaraði, Far, og framgakk: tí at HARRIN skal flýggja *tað* inn í hondina á kongi.

16 Og kongur segði við hann, Hvussu mangar ferðir skal eg eiðsvørja teg, at tú sigi mær einkið uttan *tað sum er* satt, í navni HARRANS?

17 Og hann segði, Eg sá allan Ísrael spjaddan uppiá heyggjunum, eins og seyðir sum ikki hava ein hirða: og HARRIN segði, Hesir hava ongan meistara: lat teir venda aftur hvør maður til húss síns í friði.

18 Og kongurin av Ísrael segði við Jĕ-hō´-sjâ-phăt, Segði eg tær ikki, at hann vildi einkið gott prophetera viðvíkjandi mær, men ilt?

19 Og hann segði, Hoyr tú tessvegna orð HARRANS: eg sá HARRAN sitandi á hásæti sínum, og alt herlið himins standandi hjá honum við hansara høgru hond og við hansara vinstru.

20 Og HARRIN segði, Hvør skal yvirtala Áhab, at hann má fara upp og falla í Rá´-möth-gī´-lĕ-ăd? Og ĕin segði á henda hátt, og ein annar segði á handa hátt.

21 Og tað kom fram ein andi, og stóð frammi fyri HARRANUM, og segði, Eg vil yvirtala hann.

22 Og HARRIN segði við hann, Hvarvið? Og hann segði, Eg vil fara fram, og eg vil vera ein lúgvandi andi í munninum á øllum prophetum hansara. Og hann segði, Tú skalt yvirtala *hann,* og sigra eisini: far fram, og ger so.

23 Nú tessvegna, sí, HARRIN hevur lagt ein lúgvandi anda í munnin á øllum hesum prophetum tínum, og HARRIN hevur talað ilt viðvíkjandi tær.

24 Men Zĕd-ĕ-kī´-ăh Chĕ-ná´-ă-năh sonur fór nær, og sló Mī-caĭ´-ăh á kinnina, og segði, Hvønn veg fór Andi HARRANS frá mær at tala við teg?

25 Og Mī-caĭ´-ăh segði, Sí, tú skalt síggja á tí degi, tá ið tú skalt fara inn í eitt innara kamar at fjala teg.

26 Og kongurin av Ísrael segði, Takið Mī-caĭ´-ăh, og berið hann aftur at Ámon, stjórnara staðarins, og til Jó´-ăsj, kongssonin;

27 Og sigið, Svá sigur kongur, Koyrið henda *felagan* í fongslið, og føðið hann við kvalarbreyði og við kvalarvatni, inntil eg komi í friði.

28 Og Mī-caĭ´-ăh segði, Um tú vendi aftur yvirhøvur í friði, hevur HARRIN ikki tala við̆ mær. Og hann segði, Lýðið á, O fólk, hvør *og* ĕin av tykkum.

29 So kongurin av Ísrael og Jĕ-hō´-sjâ-phăt, kongurin av Judah, fóru upp til Rá´-möth-gī´-lĕ-ăd.

30 Og kongurin av Ísrael segði við Jĕ-hō´-sjâ-phăt, Eg vil dulbúgva

meg, og innfara inn í bardagan; men far tú í skikkjur tínar. Og kongurin av Ísrael dulbúði seg, og fór inn í bardagan.

31 Men kongurin av Sýriu skipaði sínum tríati og tveimum høvuðsmonnum, sum høvdu stjórn yvir vagnum hansara, sigandi, Berjist hvørki við lítlan ella miklan, uttan einans við kongin av Ísrael.

32 Og tað bar á, tá ið høvuðsmenninir av vagnunum sóu Jĕhō´sjâ-phăt, at teir søgdu, Vissuliga, tað *er* kongur Ísraels. Og teir vendu til viks at berjast ímóti honum: og Jĕhō´sjâ-phăt rópaði út.

33 Og tað bar á, tá ið høvuðsmenninir av vagnunum varnaðust, at tað *var* ikki kongur Ísraels, at teir vendu tilbakar frá at elta hann.

34 Og ein *ávísur* maður dró ein boga við ein vága, og sló kongin av Ísrael ímillum samankomingarnar av brynjuni: hvørsvegna hann segði við føraran av vagni sínum, Vend hond tíni, og ber meg út úr herliðinum; tí at eg eri særdur.

35 Og bardagin øktist tann dagin: og kongurin varð studdur uppi í vagni sínum ímóti Sýriulendingunum, og doyði um aftan: og blóðið rann út úr sárinum inn í miðjan vagnin.

36 Og tað fór ein kunngerð út gjøgnum herliðið kring niðurfaring sólarinnar, sigandi, Hvør maður til staðar síns, og hvør maður til egna lands síns.

37 ¶ So kongur doyði, og varð førdur til Să-mâr´-ĭ-ŭ; og teir jarðaðu kong í Să-mâr´-ĭ-ŭ.

38 Og *ēin* tvó vagnin í hylinum av Să-mâr´-ĭ-ŭ; og hundarnir sloktu upp blóð hansara; og teir tvógu herbúnað hansara; samsvarandi orði HARRANS sum hann talaði.

39 Nú, restin av gerningum Áhabs, og alt sum hann gjørdi, og fílabeinshúsið sum hann gjørdi, og allir staðirnir sum hann bygdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

40 So Áhab svav hjá fedrum sínum; og Ă-hă-zī´-ăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

41 ¶ Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt Á´-să sonur byrjaði at ríkja yvir Judah í tí fjórða árinum hjá Áhab kongi av Ísrael.

42 Jĕ-hō´-sjâ-phăt *var* tríati og fimm ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja; og hann ríkti tjúgu og fimm ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Á´-zŭ-băh Sjĭl´-hī-s dóttir.

43 Og hann gekk í øllum vegum Á´-să, faðirs síns; hann vendi ikki til viks frá honum, gerandi *tað sum* rætt *var* í eygum HARRANS: hóast hetta, tey høgu plássini vórðu ikki tikin burtur; *tí at* fólkið ofraði og brendi roykilsi enn í teimum høgu plássunum.

44 Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt bant frið við kongin av Ísrael.

45 Nú, restin av gerningum Jĕ-hō´-sjâ-phăt-s, og hansara máttur sum hann sýndi, og hvussu hann kríggjaðist, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

46 Og leivdina av sodomitunum, sum vóru eftir á døgum faðirs hansara Á´-să, tók hann út úr landinum.

47 *Tað var* tá eingin kongur í Ē´-dóm: ein fulltrúi *var* kongur.

48 Jĕ-hō´-sjâ-phăt gjørdi Thâr´-sjĭsj-skip˘ til at fara til Ō´-phīr eftir gulli: men tey fóru ikki; tí at skipini vórðu brotin í Ē´-zī-ŏn-gē´-bĕr.

49 Tá segði Ă-hă-zī´-ăh Áhabs sonur við Jĕ-hō´-sjâ-phăt, Lat tænarar mínar fara við tænarum tínum í skipunum. Men Jĕ-hō´-sjâ-phăt vildi ikki.

50 ¶ Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður hjá fedrum sínum í staði Dávids, faðirs síns: og Jĕ-hór´-ăm, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

51 ¶ Ă-hă-zĭ´-ăh Áhabs sonur byrjaði at ríkja yvir Ísrael í Să-mâr´-ĭ-ŭ tað seytjanda árið hjá Jĕ-hō´-sjâ-phăt kongi av Judah, og ríkti tvey ár yvir Ísrael.

52 Og hann gjørdi ilt í eygsjón HARRANS, og gekk í vegi faðirs síns, og í vegi móður sínar, og í vegi Jĕr-ó´-bō-ăm-s Nĕ´-băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda:

53 Tí hann tænti Bā´-ăl-i, og tilbað hann, og tirraði til firtnis HARRAN Guð Ísraels, samsvarandi við alt sum faðir hansara hevði gjørt.

HIN SEINNA

BÓK KONGANNA,

VANLIGA KALLAÐ,

HIN FJÓRÐA BÓK KONGANNA.

KAPITUL 1

TÁ gjørdi Móab uppreist ímóti Ísrael eftir deyða Áhabs.

2 Og Ă-hă-zĭ´-ăh fell niður ígjøgnum eitt rimaverk í sínum ovara kamari, sum *var* í Să-mâr´-ĭ-ŭ, og varð sjúkur: og hann sendi sendiboðar, og segði við teir, Farið, fregnið av Bā´-ăl-zē´-bŭb, gudi Ĕk´-rŏn-s, hvørt eg skal koma fyri meg aftur av hesum sjúkdóminum.

3 Men eingil HARRANS segði til Ê-lĭ´-jăh Tĭsj-bĭt´-a, Reis *teg*, far upp at møta sendiboðum kongsins av Să-mâr´-ĭ-ŭ, og sig við teir, *Er tað* ikki av tí at *tað er* ikki ein Guð í Ísrael, *at* tit fara at fregna av Bā´-ăl-zē´-bŭb, gudi Ĕk´-rŏn-s?

4 Nú tessvegna, svá sigur HARRIN, Tú skalt ikki koma niður frá hasi seingini, á hvørja tú ert farin upp, men skalt vissuliga doyggja. Og Ê-lĭ´-jăh fór avstað.

5 ¶ Og tá ið sendiboðarnir vendu tilbakar at honum, segði hann við teir, Hví eru tit nú vendir tilbakar?

6 Og teir søgdu við hann, Tað kom ein maður upp at møta okkum, og segði við okkum, Farið, vendið tilbakar at kongi, sum sendi tykkum, og sigið við hann, Svá sigur HARRIN, *Er tað* ikki av tí at *tað er* ikki ein Guð í Ísrael, *at* tú sendirt at fregna av Bā´-ăl-zē´-bŭb, gudi Ĕk´-rŏn-s? tí skalt tú ikki koma niður frá hasi seingini, á hvørja tú ert farin upp, men skalt vissuliga doyggja.

7 Og hann segði við teir, Hvørsháttar maður *var hann* sum kom upp at møta tykkum, og segði tykkum hesi orð?

8 Og teir svaraðu honum, *Hann var* ein hárutur maður, og gyrdur við einum gyrðli av leðri um lendar sínar. Og hann segði, Tað *er* Ê-lĭ´-jăh Tĭsj-bĭt´-i.

9 Tá sendi kongur at honum ein høvuðsmann hjá fimti við hansara fimti. Og hann fór niðan til hansara: og sí, hann sat á toppinum av einum heyggi. Og hann talaði við hann, Tú Guðs maður, kongur hevur sagt, Kom oman.

10 Og Ê-lĭ´-jăh svaraði og segði til høvuðsmannin hjá fimti, Um eg *veri meg* ein Guðs maður, tá lat eld koma niður frá himni, og uppslúka teg og tínar fimti. Og tað kom niður eldur frá himni,

og uppslúkaði hann og hansara fimti.

11 Aftur eisini sendi hann at honum ein annan høvuðsmann hjá fimti við hansara fimti. Og hann tók til orða og segði við hann, O Guðs maður, svá hevur kongur sagt, Kom oman snarliga.

12 Og Ê-lí´-jăh svaraði og segði við teir, Um eg *veri meg* ein Guðs maður, lat eld koma niður frá himni, og uppslúka teg og tínar fimti. Og eldur Guðs kom niður frá himni, og uppslúkaði hann og hansara fimti.

13 ¶ Og hann sendi aftur ein høvuðsmann hjá hinum triðju fimti við hansara fimti. Og hin triðji høvuðsmaðurin hjá fimti fór niðan, og kom og fell á knø síni frammi fyri Ê-lí´-jăh, og bønaði hann, og segði við hann, O Guðs maður, eg biði teg, lat lív mítt, og lívið hjá hesum fimti tænarum tínum, vera dýrabært í eygsjón tíni.

14 Sí, tað kom eldur niður frá himni, og brendi upp teir tveir høvuðsmenninar hjá hinum fyrru fimtiunum við teirra fimtium: lat tí lív mítt nú vera dýrabært í eygsjón tíni.

15 Og eingil HARRANS segði við Ê-lí´-jăh, Far oman við honum: ver ikki ræddur fyri honum. Og hann reistist, og fór oman við honum at kongi.

16 Og hann segði við hann, Svá sigur HARRIN, Eftirsum at tú hevurt sent sendiboðar at fregna av Bā´-ăl-zē´-bŭb, gudi Êk´-rŏn-s, *er tað* ikki av tí at *tað er* eingin Guð í Ísrael til at fregna av orði hansara? tí skalt tú ikki koma niður av hasi seingini, á hvørja tú ert farin upp, men skalt vissuliga doyggja.

17 ¶ So hann doyði samsvarandi við orð HARRANS, sum Ê-lí´-jăh hevði talað. Og Jē-hór´-ăm ríkti í hansara stað í øðrum ári Jē-hór´-ăm-s Jē-hō´-sjâ-phăt-s sonar kongs av Judah; av tí at hann hevði ongan son.

18 Nú, restin av gerningum Ă-hă-zī´-ăh sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

KAPITUL 2

OG tað bar á, tá ið HARRIN vildi taka upp Ê-lí´-jăh inn í himin við^ einum meldurvindi, at Ê-lí´-jăh fór við Ê-lí´-sjá frá Gĭl´-găl.

2 Og Ê-lí´-jăh segði við Ê-lí´-sjá, Steðga her, eg biði teg; tí at HARRIN hevur sent meg til Beth-el. Og Ê-lí´-sjá segði *við hann, Sum* HARRIN livir, og *sum* sál tín livir, eg vil ikki fara frá tær. So teir fóru oman til Beth-el.

3 Og propheta-synirnir, sum *vóru* í Beth-el, komu fram til Ê-lí´-sjá, og søgdu við hann, Veitst tú, at HARRIN vil taka burtur meistara tín frá høvdi tínum í dag? Og hann segði, Ja, eg veit *tað;* haldið tit friði tykkara.

4 Og Ê-lí´-jăh segði við hann, Ê-lí´-sjá, steðga her, eg biði teg; tí at HARRIN hevur sent meg til Jericho. Og hann segði, *Sum* HARRIN livir, og *sum* sál tín livir, eg vil ikki fara frá tær. So teir komu til Jericho.

5 Og propheta-synirnir, sum *vóru* í Jericho, komu til Ê-lí´-sjá, og søgdu við hann, Veitst tú, at HARRIN vil taka burtur meistara tín frá høvdi tínum í dag? Og hann svaraði, Ja, eg veit *tað;* haldið tit friði tykkara.

6 Og Ê-lí´-jăh segði við hann, Steðga, eg biði teg, her; tí at HARRIN hevur sent meg til Jordan. Og hann segði, *Sum* HARRIN livir, og *sum* sál tín livir, eg vil ikki fara frá tær. Og teir tveir fóru áfram.

7 Og fimti menn av propheta-sonunum fóru, og stóðu til *tess* at

eygleiða langt burturifrá: og teir tveir stóðu við Jordan.

8 Og Ê-lī´-jăh tók sín kappa, og sveipaði *hann* saman, og sló vøtnini, og tey vórðu atskild higar og hagar, so at teir tveir fóru yvirum á turrum lendi.

9 ¶ Og tað bar á, tá ið teir vóru farnir yvirum, at Ê-lī´-jăh segði við Ê-lī´-sjă, Umbið hvat eg skal gera fyri teg, áðrenn eg verði tikin burtur frá tær. Og Ê-lī´-sjă segði, Eg biði teg, lat ein tvífaldan skamt av anda tínum vera uppiá mær.

10 Og hann segði, Tú hevurt umbiðið eitt torført ting: *hóast hetta,* um tú síggi meg, *tá ið eg verði* tikin frá tær, skal tað vera so at tær; men um ikki, skal tað ikki vera *so*.

11 Og tað bar á, sum teir enn fóru áfram, og talaðu, at sí, *tað birtist* ein vagnur av eldi, og hestar av eldi, og atskildi teir báðar sundur; og Ê-lī´-jăh fór upp við einum hvirluvindi inn í himin.

12 ¶ Og Ê-lī´-sjă sá *tað,* og hann geylaði, Mín faðir, mín faðir, Ísraels vagnur, og hestmenninir harav. Og hann sá hann ei meira: og hann tók hald á egnu klæðum sínum, og skræddi tey í tvey stykkir.

13 Hann tók upp eisini kappan hjá Ê-lī´-jăh, sum fell frá honum, og fór tilbakar, og stóð við bakka Jordans;

14 Og hann tók kappan hjá Ê-lī´-jăh, sum fell frá honum, og sló vøtnini, og segði, Hvar *er* HARRIN Guð Ê-lī´-jăh? og tá ið hann eisini hevði sligið vøtnini, skildust tey higar og hagar: og Ê-lī´-sjă fór yvirum.

15 Og tá ið propheta-synirnir, sum *vóru* til *tess* at eygleiða í Jericho, sóu hann, søgdu teir, Ê-lī´-jăh andi hvílir á Ê-lī´-sjă. Og teir komu at møta honum, og boygdu seg til jarðarinnar frammi fyri honum.

16 ¶ Og teir søgdu við hann, Sí nú, tað veri við tænarum tínum fimti sterkir menn; lat teir fara, vit biðja teg, og søkja meistara tín: bara ikki møguligvís Andi HARRANS hevur tikið hann upp, og kastað hann uppá okkurt fjall, ella inn í onkun dal. Og hann segði, Tit skulu ikki senda.

17 Og tá ið teir noyddu hann til hann skammaðist, segði hann, Sendið. Teir sendu tí fimti menn; og teir søktu tríggjar dagar, men funnu hann ikki.

18 Og tá ið teir komu aftur til hansara, (tí hann dvaldi í Jericho,) segði hann við teir, Segði eg ikki við tykkum, Farið ikki?

19 ¶ Og menninir úr staðinum søgdu við Ê-lī´-sjă, Sí, eg biði teg, staðsetingin av hesum staði *er* yndislig, eins og harri mín sær: men vatnið *er* ringt, og lendið *er* ófruktbært.

20 Og hann segði, Berið mær eina nýggja krukku, og koyrið salt harí. Og teir bóru *tað* til hansara.

21 Og hann fór fram at lindini av vøtnunum, og kastaði saltið í har, og segði, Svá sigur HARRIN, eg havi grøtt hesi vøtn; tað skal ikki vera haðani frá nakar meira deyði, ella ófruktbært *land*.

22 So vøtnini vórðu grødd at hesum degi, samsvarandi við framsøgnina hjá Ê-lī´-sjă, sum hann talaði.

23 ¶ Og hann legði avstað haðani frá at Beth-el: og sum hann fór niðan eftir veginum, komu tað fram lítil børn út úr staðinum, og háðaðu hann, og søgdu við hann, Far upp, tú skalluti knokkur; far upp, tú skalluti knokkur.

24 Og hann vendi tilbakar, og hugdi á tey, og bannaði tey í navni HARRANS. Og tað komu fram tvær hon birnir út úr skóginum, og skræddu fjøruti og tvey børn av teimum.

25 Og hann fór haðani frá til Carmel fjalls, og haðani frá kom hann aftur til Să-mâr´-ĭ-ŭ.

KAPITUL 3

NÚ, Jĕ-hór´-ăm Áhabs sonur byrjaði at ríkja yvir Ísrael í Să-mâr´-ĭ-ŭ tað átjanda árið hjá Jĕ-hō´-sjâ-phăt kongi av Judah, og ríkti tólv ár.

2 Og hann virkaði ilt í eygsjón HARRANS; men ikki líka *sum* faðir hansara, og líka *sum* móðir hansara: tí hann koyrdi burtur Bā´-ăl-s myndina, sum faðir hansara hevði gjørt.

3 Hóast hetta, hann krøktist at syndum Jĕr-ó´-bō-ăm-s Nē´-băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda; hann veik ikki harfrá.

4 ¶ Og Mē´-sjă kongur av Móab var ein seyðameistari, og greiddi kongi Ísraels eitt hundrað túsund lomb, og eitt hundrað túsund veðrar, við ullini.

5 Men tað bar á, tá ið Áhab var deyður, at kongurin av Móab gjørdi uppreist ímóti kongi Ísraels.

6 ¶ Og Jĕ-hór´-ăm kongur fór út úr Să-mâr´-ĭ-ŭ ta somu tíðina, og upptaldi alt Ísrael.

7 Og hann fór og sendi til Jĕ-hō´-sjâ-phăt-s, kongsins av Judah, sigandi, Kongurin av Móab hevur gjørt uppreist ímóti mær: vilt tú fara við mær ímóti Móab til orrustu? Og hann segði, Eg vil fara upp: eg *eri* sum tú *ert,* fólk mítt sum fólk títt, *og* hestar mínir sum hestar tínir.

8 Og hann segði, Hvønn veg skulu vit fara upp? Og hann svaraði, Vegin ígjøgnum Ē´-dóm-s oyðu.

9 So kongurin av Ísrael fór, og kongurin av Judah, og kongurin av Ē´-dóm: og teir heintaðu eina kringferð á sjey daga ferð: og har var einkið vatn til herliðið, og til fenaðin sum fylgdi teimum.

10 Og kongurin av Ísrael segði, Akk! at HARRIN hevur kallað hesar tríggjar kongar saman, at flýggja teir inn í hond Móabs!

11 Men Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði, *Er tað* ikki her ein prophetur HARRANS, at vit mega fregna av HARRANUM við hann? Og ēin av tænarunum hjá kongi Ísraels svaraði og segði, Her *er* Ê-lī´-sjă Sjá´-phăt-s sonur, sum helti vatn á hendur Ê-lī´-jăh.

12 Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði, HARRANS orð er hjá honum. So kongurin av Ísrael og Jĕ-hō´-sjâ-phăt og kongurin av Ē´-dóm fóru oman til hansara.

13 Og Ê-lī´-sjă segði við kongin av Ísrael, Hvat havi eg at gera við teg? slepp tær til propheta faðirs tíns, og til propheta móður tínar. Og kongurin av Ísrael segði við hann, Nei: tí at HARRIN hevur kallað hesar tríggjar kongar saman, til at flýggja teir inn í hond Móabs.

14 Og Ê-lī´-sjă segði, *Sum* HARRI herliðanna livir, frammi fyri hvørjum eg standi, vissuliga, var tað ikki at eg meti nærveru Jĕ-hō´-sjâ-phăt-s, kongsins av Judah, vildi eg ikki hugt móti tær, ella sæð teg.

15 Men nú, førið mær ein streingjaleikara. Og tað bar á, tá ið streingjaleikarin spældi, at hond HARRANS kom uppá hann.

16 Og hann segði, Svá sigur HARRIN, Gerið henda dal fullan av gryvjum.

17 Tí at svá sigur HARRIN, Tit skulu ikki síggja vind, eiheldur skulu tit síggja regn; tó skal hasin dalurin verða fyltur við vatni, at tit mega drekka, bæði tit, og fenaður tykkara, og djór˘ tykkara.

18 Og hetta er *bert* eitt lætt*isligt* ting í eygsjón HARRANS: hann vil flýggja Móabitarnar eisini inn í hond tykkara.

19 Og tit skulu sláa hvønn girdan stað, og hvønn úrvals stað,

og skulu fella hvørt gott træ, og tippa allar brunnar av vatni, og skemma hvørt gott jarðarstykki við steinum.

20 Og tað bar á um morgunin, tá ið matofrið varð ofrað, at sí, tað kom vatn eftir vegi Ē′-dóm-s, og landið varð fylt við vatni.

21 ¶ Og tá ið allir Móabitarnir hoyrdu, at kongarnir vóru komnir upp at berjast ímóti teimum, savnaðu teir allar sum vóru førir fyri at fara í herbúnað, og uppeftir, og stóðu í markinum.

22 Og teir risu upp árla um morgunin, og sólin skein uppá vatnið, og Móabitarnir sóu vatnið hīnumegin *so* reytt sum blóð:

23 Og teir søgdu, Hetta *er* blóð: kongarnir eru vissuligani vignir, og teir hava sligið hvør annan: nú tessvegna, Móab, til ránsfæið.

24 Og tá ið teir komu til leirin hjá Ísrael, risu Ísraelitarnir upp og slógu Móabitarnar, so at teir flýddu frammi fyri teimum: men teir fóru frameftir sláandi Móabitarnar, enntá í landi *teirra*.

25 Og teir bardu niður staðirnar, og á hvørt gott jarðarstykki kastaði hvør maður stein sín, og fyltu tað; og teir stappaðu allar brunnarnar av vatni, og feldu øll tey góðu trøini: einans í Kīr-hâr′-ā-sēth eftirlótu teir steinar tess; hvussu enn er, sleingjararnir fóru um *tað*, og slógu tað.

26 ¶ Og tá ið kongurin av Móab sá, at orrustan var ov svár hjá honum, tók hann við sær sjey hundrað menn, sum drógu svørð, til at bróta ígjøgnum, *alt* at kongi Ē′-dóm-s: men teir kundu ikki.

27 Tá tók hann elsta son sín, sum skuldi havt ríkt í hansara stað, og ofraði hann *til* eitt brennioffur uppiá múrinum. Og har varð mikil harmavreiði ímóti Ísrael: og teir fóru avstað frá honum, og vendu aftur til *egna* land *sítt*.

KAPITUL 4

NÚ, tað rópti ein ávís kvinna av konunum hjá prophetasonunum at Ê-lī′-sjă, sigandi, Tín tænari, maður mín, er deyður; og tú veitst, at tænari tín óttaðist HARRAN: og lángevarin er komin at taka at sær mínar tveir synir til at vera trælmenn.

2 Og Ê-lī′-sjă segði við hana, Hvat skal eg gera fyri teg? sig mær, hvat hevurt tú í húsinum? Og hon segði, Tín tænastumoy hevur ikki nakað ting í húsinum, uttan ein pott av olju.

3 Tá segði hann, Far, læn tær kerˇ útiumkring av øllum grannum tínum, *enntá* tóm ker; læn ikki fá.

4 Og tá ið tú ert komin inn, skalt tú loka hurðina uppá teg og uppá synir tínar, og skalt hella út í øll tey kerini, og tú skalt seta til síðis tað sum er fult.

5 So hon fór frá honum, og lokaði hurðina uppá seg og uppá synir sínar, sum førdu *kerini* til hennara; og hon helti út.

6 Og tað bar á, tá ið íløtini vóru full, at hon segði við son sín, Før mær enn eitt ker. Og hann segði við hana, *Tað er* ikki eitt ker meira. Og oljan steðgaði.

7 Tá kom hon og taldi Guðs manninum. Og hann segði, Far, sel oljuna, og rinda skuld tína, og livi tú og børn tíni av restini.

8 ¶ Og tað fell *út* á einum degi, at Ê-lī′-sjă fór yvir til Sjū′-nēm, hvar *var* ein mæt kvinna; og hon noyddi hann at eta breyð. Og *soleiðis* varð tað, *at* so ofta sum hann fór framvið, vendi hann inn hagar at eta breyð.

9 Og hon segði við ektamann sín, Sí nú, eg varnist at hesin *er* ein heilagur Guðs maður, sum fer framvið okkum áframhaldandi.

10 Latum okkum gera eitt lítið

kamar, eg biði teg, á múrinum; og latum okkum seta til hansara har eina song, og eitt borð, og ein stól, og ein ljósastaka: og tað skal verða, tá ið hann kemur til okkara, at hann skal venda inn hagar.

11 Og tað fell *út* á einum degi, at hann kom hagar, og hann vendi inn í kamarið, og legðist har.

12 Og hann segði til Gě-hā´-zī-s, tænara síns, Rópa hesa Sjû-năm-mīt´-una. Og tá ið hann hevði rópað hana, stóð hon frammi fyri honum.

13 Og hann segði við hann, Sig nú við hana, Sí, tú hevurt verið umsorganarfull fyri okkum við allari hesi umsorgan; hvat *eigur* at verða gjørt fyri teg? vildirt tú verðið talað fyri fyri kongi, ella fyri høvuðsmanni herliðsins? Og hon svaraði, Eg búgvi egna fólks míns millum.

14 Og hann segði, Hvat *eigur* tá at verða gjørt fyri hana? Og Gě-hā´-zī svaraði, Sanniliga, hon hevur einkið barn, og ektamaður hennara er gamalur.

15 Og hann segði, Rópa hana. Og tá ið hann hevði rópað hana, stóð hon í durinum.

16 Og hann segði, Um hesa tíð, samsvarandi við tíð lívs, skalt tú fevna ein son. Og hon segði, Nei, harri mín, *tú* Guðs maður, lúgv ikki at tænastumoy tíni.

17 Og kvinnan gat, og føddi ein son á tí tíðarskeiðinum sum Ê-lī´-sjā hevði sagt við hana, samsvarandi við tíð lívs.

18 ¶ Og tá ið barnið var vaksið, fell tað *út* á einum degi, at hann fór út til faðirs síns til skurðarmannanna.

19 Og hann segði við faðir sín, Mítt høvur, mítt høvur. Og hann segði til sveins, Ber hann til móður hansara.

20 Og tá ið hann hevði tikið hann, og ført hann til móður hansara, sat hann á knøum hennara til middags, og *so* doyði.

21 Og hon fór upp, og legði hann á songina hjá Guðs manninum, og læt aftur *hurðina* uppá hann, og fór út.

22 Og hon kallaði á mann sín, og segði, Send mær, eg biði teg, ēin av teimum ungu monnunum, og ēin av asnunum, at eg má renna til Guðs mansins, og koma aftur.

23 Og hann segði, Hvørsvegna vilt tú fara til hansara í dag? *tað er* hvørki nýmáni, ella sabbatur. Og hon segði, *Tað skal verða* væl *statt*.

24 Tá saðlaði hon ein asna, og segði til tænara síns, Ak, og far frameftir; slaka ikki *tína* ríðing fyri meg, uttan eg skipi tær.

25 So hon fór og kom at Guðs manninum til Carmel fjalls. Og tað bar á, tá ið Guðs maðurin sá hana langt burturifrá, at hann segði til Gě-hā´-zī-s, tænara síns, Sí, *haryviri er* handan Sjû-năm-mīt´-an:

26 Renn nú, eg biði teg, at møta henni, og sig við hana, *Er tað* væl *statt* hjá tær? *er tað* væl *statt* hjá ektamanni tínum? *er tað* væl *statt* hjá barninum? Og hon svaraði, *Tað er* væl *statt*.

27 Og tá ið hon kom til Guðs mansins til heyggjarins, greip hon hann við føturnar: men Gě-hā´-zī kom nær at stoyta hana burtur. Og Guðs maðurin segði, Lat hana vera; tí at sál hennara *er* nívd innan í henni: og HARRIN hevur fjalt *tað* frá mær, og hevur ikki sagt mær.

28 Tá segði hon, Tráaði eg ein son av harra mínum? segði eg ikki, Teipa meg ei?

29 Tá segði hann til Gě-hā´-zī-s, Gyrð upp lendar tínar, og tak stav mín í hond tína, og far tín veg: um tú hitti nakran mann, heilsa honum ikki; og um nakar

heilsi tær, svara honum ikki aftur: og legg stav mín uppá andlitið á barninum.

30 Og móðirin hjá barninum segði, *Sum* HARRIN livir, og *sum* sál tín livir, eg vil ikki fara frá tær. Og hann reistist, og fylgdi henni.

31 Og Gě-hā´-zī fór áfram undan teimum, og legði stavin uppá andlitið á barninum; men *har var* hvørki rødd, ella hoyrn. Hvørsvegna hann fór aftur at møta honum, og taldi honum, sigandi, Barnið er ikki vaknað.

32 Og tá ið Ê-lī´-sjă var komin inn í húsið, sí, barnið var deytt, *og* lá uppiá song hansara.

33 Hann fór inn tessvegna, og lokaði hurðina uppá teir tveir, og bað at HARRANUM.

34 Og hann fór upp, og legðist uppá barnið, og koyrdi munn sín uppá munn hansara, og eygu síni uppá eygu hansara, og hendur sínar uppá hendur hansara: og hann strekti seg uppá barnið; og holdið hjá barninum vaks heitt.

35 Síðan vendi hann aftur, og gekk í húsinum til og frá; og fór upp, og strekti seg uppá hann: og barnið neys sjey ferðir, og barnið opnaði eygu síni.

36 Og hann rópaði Gě-hā´-zī, og segði, Rópa hesa Sjû-năm-mīt´-una. So hann rópaði hana. Og tá ið hon var komin inn at honum, segði hann, Tak upp son tín.

37 Tá fór hon inn, og fell við føtur hansara, og boygdi seg til jarðarinnar, og tók upp son sín, og fór út.

38 ¶ Og Ê-lī´-sjă kom aftur til Gĭl´-găl: og *tað var* eitt hallár í landinum; og propheta-synirnir sótu frammi fyri honum: og hann segði við tænara sín, Set útá hin stóra pottin, og sjóða súpan til propheta-synirnir.

39 Og ēin fór út í akurin at savna urtir, og fann eitt vilt víntræ, og savnaði harav vill grasker fang sítt fult, og kom og álaði *tey* inn í pottin av súpan: tí at teir kendu *tey* ikki.

40 So teir heltu út til menninar at eta. Og tað bar á, sum teir ótu av súpanini, at teir róptu út, og søgdu, O *tú* Guðs maður, *tað er* deyði í pottinum. Og teir kundu ikki eta *harav*.

41 Men hann segði, Tá komið við mjøli. Og hann kastaði *tað* inn í pottin; og hann segði, Hellið út til fólkið, at teir mega eta. Og har var einkið mein í pottinum.

42 ¶ Og tað kom ein maður frá Bā´-ăl-sjă´-ī-sjă, og bar Guðs manninum breyð av frumávøkstunum, tjúgu heilbreyð av byggi, og full øks av korni í hylki tess. Og hann segði, Gev fólkinum, at teir mega eta.

43 Og hansara tænastumaður segði, Hvat, skuldi eg sett hetta frammanfyri hundrað monnum? Hann segði aftur, Gev fólkinum, at teir mega eta: tí at svá sigur HARRIN, Teir skulu eta, og skulu leiva *harav*.

44 So hann setti *tað* frammanfyri teimum, og teir ótu, og leivdu *harav*, samsvarandi við orð HARRANS.

KAPITUL 5

NÚ, Ná´-ă-măn, høvuðsmaðurin av herliði Sýriukongsins, var ein mætur maður hjá meistara sínum, og heiðursamur, av tí at við^ honum hevði HARRIN givið útfrían at Sýriu: hann var eisini ein mektigur maður í reystleika, *men hann var* ein spitalskur.

2 Og Sýriulendingarnir vóru farnir út í flokkum, og høvdu ført burtur *til* fanga út úr landi Ísraels eina lítla moyggj; og hon vartaði um konu Ná´-ă-măn-s.

3 Og hon segði við matmóður sína, Gævi Guð, *at* harri mín *var*

hjá prophetinum sum *er* í Sămâr´ĭ-ŭ! tí at hann vildi komið honum aftur fyri seg av spitalskni hansara.

4 Og *ēin* fór inn, og taldi harra sínum, sigandi, Soleiðis og soleiðis segði moyggin sum *er* úr landi Ísraels.

5 Og kongurin av Sýriu segði, Kom nú, far, og eg vil senda eitt bræv at kongi Ísraels. Og hann fór avstað, og tók við sær tíggju talentir av silvuri, og seks túsund *stykkir* av gulli, og tíggju skiftir av klædnaði.

6 Og hann bar brævið til Ísraels kongs, sigandi, Nú, tá ið hetta brævið er komið at tær, sí, eg havi *saman við* sent Ná´ă-măn, tænara mín, til tín, at tú mást koma honum aftur fyri seg av spitalskni hansara.

7 Og tað bar á, tá ið kongurin av Ísrael hevði lisið brævið, at hann skræddi klæðir síni, og segði, *Eri* eg Guð, til at drepa og gera livandi, at hesin maðurin sendir at mær at koma einum manni aftur fyri seg av spitalskni hansara? hvørsvegna umhugsið, eg biði tykkum, og síggið hvussu hann søkir ein trætnað ímóti mær.

8 ¶ Og tað varð *so,* tá ið Ê-lĭ´-sjă, Guðs maðurin, hevði hoyrt, at kongur Ísraels hevði skrætt klæðir síni, at hann sendi til kongsins, sigandi, Hvørsvegna hevurt tú skrætt klæðir tíni? lat hann koma nú til mín, og hann skal vita, at tað er ein prophetur í Ísrael.

9 So Ná´-ă-măn kom við hestum sínum og við vagni sínum, og stóð við dyrnar av húsi Ê-lĭ´-sjă.

10 So Ê-lĭ´-sjă sendi ein sendiboða at honum, sigandi, Far og tváa *tær* í Jordan sjey ferðir, og títt hold skal koma aftur til tín, og tú skalt verða reinur.

11 Men Ná´-ă-măn varð vreiður, og fór avstað, og segði, Sí, eg helt, Hann vil vissuliga koma út til mín, og standa, og kalla á navn HARRANS Guðs síns, og sláa hond sína yvir staðið, og koma tí spitalska aftur fyri seg.

12 *Eru* ikki Ăb´-ă-nă og Phâr´-pâr, áir av Damascus, betri enn øll vøtn Ísraels? má eg ikki tváa *mær* í teimum, og verða reinur? So hann vendi og fór avstað í eini øði.

13 Og hansara tænarar komu nær, og talaðu innat honum, og søgdu, Mín faðir, *um* propheturin hevði áboðið tær *at gera onkun* mikin lut, vildirt tú ikki havt gjørt *hann?* hvør mikið heldur tá, tá ið hann sigur til tín, Tváa *tær,* og verð reinur?

14 Tá fór hann oman, og dyppaði sær sjey ferðir í Jordan, samsvarandi við framsøgnina hjá Guðs manninum: og hansara hold kom aftur, líkt holdinum hjá einum lítlum barni, og hann varð reinur.

15 ¶ Og hann vendi aftur til Guðs mansins, hann og alt hansara samlag, og kom, og stóð frammi fyri honum: og hann segði, Sí, nú veit eg, at *tað er* eingin Guð á allari jørðini, uttan í Ísrael: nú tessvegna, eg biði teg, tak eina signing av tænara tínum.

16 Men hann segði, *Sum* HARRIN livir, frammi fyri hvørjum eg standi, eg vil ongari taka við. Og hann noyddi hann at taka *tað;* men hann noktaði.

17 Og Ná´-ă-măn segði, Skal tað ikki tá, eg biði teg, verða givið til tænara tíns tveggja múldjóra byrði av jørð? tí at tænari tín vil hiðanífrá ofra hvørki brennioffur ella sláturoffur at øðrum gudum, uttan HARRANUM.

18 Í hesum tingi HARRIN náði tænara tín, *at* tá ið meistari mín fer inn í hús Rimmons at tilbiðja har, og hann lenar á hond mína,

og eg boyggi meg í húsi Rimmons: tá ið eg boyggi niður meg sjálvan í húsi Rimmons, HARRIN náði tænara tín í hesum tingi.

19 Og hann segði við hann, Far í friði. So hann veik frá honum ein stuttan veg.

20 ¶ Men Gě-hā´-zī, tænari Ê-lī´-sjă, Guðs mansins, segði, Sí, mín meistari hevur spart Ná´-ă-măn, henda Sýriulending, í ikki at taka við av hansara hondum tað sum hann kom við: men, *sum* HARRIN livir, eg vil renna aftaná honum, og taka eitthvørt av honum.

21 So Gě-hā´-zī fylgdi aftaná Ná´-ă-măn-i. Og tá ið Ná´-ă-măn sá *hann* rennandi aftaná sær, lætti hann *sær* niður frá vagninum at møta honum, og segði, *Er* alt væl *statt?*

22 Og hann segði, Alt *er* væl *statt*. Mín meistari hevur sent meg, sigandi, Sí, enntá nú veri tað komnir til mín frá Ē´-phră-ĭm fjalli tveir ungir menn av pro-pheta-sonunum: gev teimum, eg biði teg, eina talent av silvuri, og tvey skiftir av klæðum.

23 Og Ná´-ă-măn segði, Lat tær lynda, tak tvær talentir. Og hann noyddi hann, og bant tvær talentir av silvuri í tveir posar, við tveimum skiftum av klæðum, og legði *tey* uppá tveir av tænarum sínum; og teir bóru *tey* framman-fyri honum.

24 Og tá ið hann kom til torn-ið, tók hann *tey* frá teirra hond, og kom *teimum* fyri í húsinum: og hann læt menninar fara, og teir fóru avstað.

25 Men hann fór inn, og stóð frammi fyri meistara sínum. Og Ê-lī´-sjă segði við hann, Hvaðan *kemurt tú,* Gě-hā´-zī? Og hann segði, Tænari tín fór ongasteðs.

26 Og hann segði við hann, Fór ikki hjarta mítt *við tær,* tá ið maðurin vendi aftur frá vagni sínum at møta tær? *Er tað* ein tíð at taka við peningi, og at taka við klæðum, og olivingørðum, og víngørðum, og seyði, og oksum, og tænastumonnum, og tænastu-moyggjum?

27 Spitalsknin tessvegna hjá Ná´-ă-măn-i skal krøkjast at tær, og at sáði tínum um ævir. Og hann fór út frá hansara nærveru ein spitalskur, *so hvítur* sum snjó.

KAPITUL 6

OG propheta-synirnir søgdu við Ê-lī´-sjă, Sí nú, plássið, har vit búgva hjá tær, er ov trongt hjá okkum.

2 Lat okkum fara, vit biðja teg, at Jordan, og taka haðani hvør maður ein bumm, og latum okk-um gera okkum eitt stað har, har vit mega búgva. Og hann svaraði, Farið tit.

3 Og ēin segði, Lat tær lynda, eg biði teg, og far við tænarum tínum. Og hann svaraði, Eg vil fara.

4 So hann fór við teimum. Og tá ið teir komu til Jordan, skóru teir niður við'.

5 Men sum ēin feldi ein bumm, datt øks-høvdið í vatnið: og hann geylaði, og segði, Akk, meistari! tí at hon var lænt.

6 Og Guðs maðurin segði, Hvar datt tað? Og hann sýndi honum plássið. Og hann skar niður ein kvist, og kastaði *hann* inn hagar; og jarnið svam.

7 Tí segði hann, Tak *tað* upp til tín. Og hann stakk út hond sína, og tók tað.

8 ¶ Tá kríggjaði kongurin av Sýriu ímóti Ísrael, og helt ráð við tænarum sínum, sigandi, Í tí og tí plássinum *skal vera* leirur mín.

9 Og Guðs maðurin sendi at Ísraels kongi, sigandi, Ver varin, at tú fari ikki um eitt sovorðið pláss; tí at Sýriulendingarnir eru komnir oman hagar.

10 Og kongur Ísraels sendi til plássið sum Guðs maðurin segði honum, og ávaraði hann um, og bjargaði sær har, ikki ēina ferð ella tvær ferðir.

11 Tí varð hjartað hjá konginum av Sýriu sára órógvað fyri hetta tingið; og hann kallaði tænarar sínar, og segði við teir, Vilja tit ikki sýna mær, hvør av okkum *er* fyri kongi Ísraels?

12 Og ēin av hansara tænarum segði, Eingin, harri mín, O kongur: men Ê-lí´-sjă, prophēturin sum *er* í Ísrael, sigur kongi Ísraels orðini sum tú talart í seingjarkamari tínum.

13 ¶ Og hann segði, Farið og njósnist hvar hann *er,* at eg má senda og heinta hann. Og tað varð talt honum, sigandi, Sí, *hann er* í Dō´-thăn.

14 Tí sendi hann hagar hestar, og vagnar, og eitt mikið herlið: og teir komu um nátt*ina,* og umringaðu staðin umkring.

15 Og tá ið tænarin hjá Guðs manninum var risin árla, og farin fram, sí, eitt herlið umringaði staðin bæði við hestum og vagnum. Og hansara tænarar søgdu við hann, Akk, meistari mín! hvussu skulu vit gera?

16 Og hann svaraði, Óttast ikki: tí at teir, sum *veri* við okkum, *eru* fleiri enn teir sum *veri* við teimum.

17 Og Ê-lí´-sjă bað, og segði, HARRI, eg biði teg, opna eygu hans, at hann má sjá. Og HARRIN opnaði eyguni hjá tí unga manninum; og hann sá: og sí, fjallið *var* fult av hestum og vagnum av eldi rundan um Ê-lí´-sjă.

18 Og tá ið teir komu oman til hansara, bað Ê-lí´-sjă at HARRANUM, og segði, Slá hetta fólk, eg biði teg, við blindni. Og hann sló teir við blindni samsvarandi við orðið hjá Ê-lí´-sjă.

19 ¶ Og Ê-lí´-sjă segði við teir, Hetta *er* ikki vegurin, eiheldur *er* hetta staðurin: fylgið mær, og eg vil føra tykkum til mannin, hvønn tit søkja. Men hann leiddi teir til Să-mâr´-ĭ-ŭ.

20 Og tað bar á, tá ið teir vóru komnir inn í Să-mâr´-ĭ-ŭ, at Ê-lí´-sjă segði, HARRI, opna eyguni hjá hesum *monnunum,* at teir mega sjá. Og HARRIN opnaði teirra eygu, og teir sóu; og sí, *teir vóru* í miðjari Să-mâr´-ĭ-ŭ.

21 Og kongurin av Ísrael segði við Ê-lí´-sjă, tá ið hann sá teir, Mín faðir, skal eg slá *teir?* skal eg slá *teir?*

22 Og hann svaraði, Tú skalt ikki slá *teir:* vildirt tú sligið teir sum tú hevurt tikið *til* fanga við svørði tínum og við boga tínum? set breyð og vatn frammanfyri teimum, at teir mega eta og drekka, og fara til meistara síns.

23 Og hann fyrireikaði mikla veiting til teirra: og tá ið teir høvdu etið og drukkið, sendi hann teir avstað, og teir fóru til meistara síns. So liðini av Sýriu komu ei meira inn í land Ísraels.

24 ¶ Og tað bar á eftir hetta, at Bĕn-há´-dăd kongur av Sýriu savnaði alt herlið sítt, og fór upp, og kringsetti Să-mâr´-ĭ-ŭ.

25 Og tað var ein mikil hungursneyð í Să-mâr´-ĭ-ŭ: og sí, teir kringsettu tað, inntil eitt asnarhøvd varð *selt* fyri fýrsinstjúgu *stykkir* av silvuri, og fjórðingsparturin av eini cāb av dúgvuskarni fyri fimm *stykkir* av silvuri.

26 Og sum kongurin av Ísrael fór framvið uppiá múrinum, rópaði tað ein kvinna at honum, sigandi, Hjálp, harri mín, O kongur.

27 Og hann segði, Um HARRIN ikki hjálpi tær, hvaðani skal eg hjálpa tær? burtur úr løðugólvinum, ella burtur úr vínfarginum?

28 Og kongurin segði við hana,

Hvat bagir tær? Og hon svaraði, Henda kvinna segði við meg, Gev son tín, at vit mega eta hann í dag, og vit vilja eta son mín í morgin.

29 So vit kókaðu son mín, og ótu hann: og eg segði við hana á tí næsta deginum, Gev son tín, at vit mega eta hann: og hon hevur krógvað son sín.

30 ¶ Og tað bar á, tá ið kongurin hoyrdi orðini hjá kvinnuni, at hann skræddi klæðir síni; og hann fór framvið uppiá múrinum, og fólkið hugdi, og sí, *hann hevði* sekkjaklæði innanfyri uppiá holdi sínum.

31 Tá segði hann, Guð geri soleiðis og meira eisini við meg, um høvdið á Ê-lĭ´-sjă Sjá´-phăt-s syni skal standa á honum henda dag.

32 Men Ê-lĭ´-sjă sat í húsi sínum, og teir elstu sótu hjá honum; og *kongur* sendi ein mann frammanfyri sær ífrá: men áður *enn* sendiboðin kom til hansara, segði hann til hinna elstu, Síggja tit, hvussu hesin sonurin at einum myrðara hevur sent til at taka burtur høvur mítt? hyggið, tá ið sendiboðið kemur, lokið hurðina, og haldið honum fast við hurðina: *er* ikki ljóðið av fótum meistara hansara aftanfyri hann?

33 Og meðan hann enn talaði við teir, sí, sendiboðin kom oman at honum: og hann segði, Sí, hetta illa *er* av HARRANUM; hvat skuldi eg bíðað eftir HARRANUM longur?

KAPITUL 7

TÁ segði Ê-lĭ´-sjă, Hoyrið tit orð HARRANS; Svá sigur HARRIN, Í morgin, um hesa tíð, *skal* eitt mál av finum mjøli *verða selt* fyri ein sjē´-kŭl, og tvey mál av byggi fyri ein sjē´-kŭl, í portrinum av Să-mâr´-ĭ-ŭ.

2 Ein harri, á hvørs hond kongur lenaði, tá svaraði Guðs manninum, og segði, Sí, *Um* HARRIN vildi gjørt gluggar í himni, mátti hetta tingið verðið? Og hann segði, Sí, tú skalt síggja *tað* við eygum tínum, men skalt ikki eta harav.

3 ¶ Og har vóru fýra spitalskir menn við inngongdina inn av portrinum: og teir søgdu hvør til annars, Hví sita vit her, inntil vit doyggja?

4 Um vit sigi, Vit vilja innfara inn í staðin, tá *er* hungursneyðin í staðinum, og vit skulu doyggja har: og um vit siti stillir her, doyggja vit eisini. Nú tessvegna, komið, og latum okkum falla at herliði Sýriulendinganna: um teir bjargi okkum á lívi, skulu vit liva; og um teir drepi okkum, skulu vit bert doyggja.

5 Og teir risu upp í hálvalýsinum, til at fara at leirinum hjá Sýriulendingunum: og tá ið teir vóru komnir til hin ytsta partin av leirinum hjá Sýriu, sí, *tað var* eingin maður har.

6 Tí at Harrin hevði fingið herliðið hjá Sýriulendingunum at hoyra eitt ljóð av vagnum, og eitt ljóð av hestum, *enntá* ljóðið av einum miklum herliði: og teir søgdu hvør til annars, Sí, kongurin av Ísrael hevur leigað ímóti okkum kongar Hittitanna, og kongar Egyptanna, at koma uppá okkum.

7 Hvørsvegna teir reistust og flýddu í hálvalýsinum, og eftirlótu tjøld síni, og hestar sínar, og asnar sínar, enntá leirin sum hann *var,* og flýddu fyri sítt lív.

8 Og tá ið hesir spitalsku komu til hin ytsta partin av leirinum, fóru teir inn í ēitt tjald, og ótu og drukku, og bóru haðani silvur, og gull, og klædnað, og fóru og fjaldu *tað;* og komu aftur, og innfóru inn í eitt annað tjald, og bóru haðani *eisini,* og fóru og fjaldu *tað*.

9 Tá søgdu teir hvør til annars, Vit gera ikki væl: hesin dagurin *er* ein dagur av góðum tíðindum, og vit halda friði várum: um vit dvølji til morgun ljósið, vil okkurt mein koma uppá okkum: nú tessvegna komið, at vit mega fara og siga húshaldi kongsins frá.

10 So teir komu og kallaðu at portursvørði staðarins: og teir taldu teimum, sigandi, Vit komu til leirin hjá Sýriulendingunum, og sí, *tað var* eingin maður har, eiheldur rødd á manni, men hestar bundnir, og asnar bundnir, og tjøldini sum tey *vóru*.

11 Og hann kallaði portursvørðirnar; og teir søgdu *tað* fyri kongshúsinum fyri innan.

12 ¶ Og kongurin reistist um náttina, og segði við tænarar sínar, Eg vil nú sýna tykkum, hvat Sýriulendingarnir hava gjørt við okkum. Teir vita, at vit *veri* svangir; tí eru teir farnir út úr leirinum at fjala seg í akrinum, sigandi, Tá ið teir koma út úr staðinum, skulu vit fanga teir livandi, og sleppa inn í staðin.

13 Og ēin av hansara tænarum svaraði og segði, Lat *onkrar* taka, eg biði teg, fimm av hestunum, sum eru eftirverandi, sum eru eftir í staðinum, (sí, teir *eru* sum øll fjøldin av Ísrael, sum eru eftir í honum: sí, *eg sigi,* teir *eru* enntá sum øll fjøldin av Ísraelitunum, sum eru upptærdir:) og latum okkum senda og vita.

14 Teir tóku tí tveir vagnhestar; og kongurin sendi aftaná herliðinum hjá Sýriulendingunum, sigandi, Farið og vitið.

15 Og teir fóru aftaná teimum at Jordan: og sí, allur vegurin *var* fullur av klæðum og reiðum, sum Sýriulendingarnir høvdu kastað burtur í skundi sínum. Og sendiboðarnir komu aftur, og søgdu kongi frá.

16 Og fólkið fór út, og rændu tjøldini hjá Sýriulendingunum. So eitt mál av fínum mjøli varð *selt* fyri ein sjē´-kŭl, og tvey mál av byggi fyri ein sjē´-kŭl, samsvarandi við orð HARRANS.

17 ¶ Og kongurin útnevndi fúrstan, á hvørs hond hann lenaði, at hava áleggingina av portrinum: og fólkið traðkaði uppá hann í portrinum, og hann doyði, eins og Guðs maðurin hevði sagt, sum talaði, tá ið kongurin kom oman til hansara.

18 Og tað bar á eins og Guðs maðurin hevði talað til kongsins, sigandi, Tvey mál av byggi fyri ein sjē´-kŭl, og eitt mál av fínum mjøli fyri ein sjē´-kŭl, skal verða í morgin um hesa tíð í portrinum av Să-mâr´-ĭ-ŭ:

19 Og tann harrin svaraði Guðs manninum, og segði, Nú, sí, *um* HARRIN skuldi gjørt gluggar í himni, mátti eitt slíkt ting verðið? Og hann segði, Sí, tú skalt síggja tað við eygum tínum, men skalt ikki eta harav.

20 Og soleiðis fell tað út hjá honum: tí at fólkið traðkaði uppá hann í portrinum, og hann doyði.

KAPITUL 8

TÁ talaði Ē-lĭ´-sja innat kvinnuni, hvørs son hann hevði endurbøtt til lívs, sigandi, Reis *teg,* og fari tú og húski títt, og útisit hvarsumhelst *ið* tú kanst útisita: tí at HARRIN hevur kallað eftir eini hungursneyð; og hon skal eisini koma uppá landið sjey ár.

2 Og kvinnan reistist, og gjørdi eftir framsøgn Guðs mansins: og hon fór við húski sínum, og útisat í landi Philistanna sjey ár.

3 Og tað bar á við enda hinna sjey ára, at kvinnan vendi aftur úr landi Philistanna: og hon fór fram at rópa á kong fyri hús sítt og fyri land sítt.

4 Og kongur tosaði við Gĕ-hā´-zī, tænara Guðs mansins, sigandi, Sig mær, eg biði teg, øll hini miklu ting, sum Ê-lī´-sjā hevur gjørt.

5 Og tað bar á, sum hann segði kongi frá, hvussu hann hevði endurbøtt eitt deytt likam til lívs, at sí, kvinnan, hvørs son hann hevði endurbøtt til lívs, geylaði til kongsins fyri hús sítt og fyri land sítt. Og Gĕ-hā´-zī segði, Mín harri, O kongur, hetta *er* kvinnan, og hetta *er* sonur hennara, hvønn Ê-lī´-sjā endurbøtti til lívs.

6 Og tá ið kongurin spurdi kvinnuna, segði hon honum frá. So kongurin útnevndi henni ein ávísan yvirmann, sigandi, Endurbøt alt sum *var* hennara, og allar ávøkstirnar av akrinum, síðan tann dag sum hon fór frá landinum, enntá inntil nú.

7 ¶ Og Ê-lī´-sjā kom til Damascus; og Bĕn-há´-dăd, kongurin av Sýriu, var sjúkur; og tað varð sagt honum, sigandi, Guðs maðurin er komin higar.

8 Og kongurin segði við Hā´-zā-ĕl, Tak eina gávu í tína hond, og far, møt Guðs manninum, og fregna av HARRANUM við hann, sigandi, Skal eg koma fyri meg aftur av hesum sjúkdóminum?

9 So Hā´-zā-ĕl fór at møta honum, og tók eina gávu við sær, enntá av hvørjum góðum tingi úr Damascus, fjøruti kamela byrði, og kom og stóð frammi fyri honum, og segði, Sonur tín, Bĕn-há´-dăd, kongurin av Sýriu, hevur sent meg til tín, sigandi, Skal eg koma fyri meg aftur av hesum sjúkdóminum?

10 Og Ê-lī´-sjā segði við hann, Far, sig við hann, Tú kanst vissuliga koma fyri teg: hvussu enn er, HARRIN hevur sýnt mær, at hann skal vissuliga doyggja.

11 Og hann stillaði sína ásjón støðufastliga, inntil hann skammaðist: og Guðs maðurin grætt.

12 Og Hā´-zā-ĕl segði, Hví grætur harri mín? Og hann svaraði, Av tí at eg veit tað illa, sum tú vilt gera innat børnum Ísraels: teirra festningar vilt tú seta eld á, og teirra ungu menn vilt tú vega við svørðinum, og vilt smekka teirra ungu børn, og spretta upp teirra kvinnur við barn.

13 Og Hā´-zā-ĕl segði, Men hvat, *er* tænari tín ein hundur, at hann skuldu gjørt hetta mikla ting? Og Ê-lī´-sjā svaraði, HARRIN hevur sýnt mær, at tú *skalt verða* kongur yvir Sýriu.

14 So hann fór avstað frá Ê-lī´-sjā, og kom til meistara síns; hvør segði til hansara, Hvat segði Ê-lī´-sjā til tín? Og hann svaraði, Hann segði mær, *at* tú skuldirt vissuliga koma fyri teg.

15 Og tað hendi á morgisdeginum, at hann tók eitt tjúkt klæði, og dyppaði *tað* í vatn, og breiddi *tað* á andlit hansara, so at hann doyði: og Hā´-zā-ĕl ríkti í hansara stað.

16 ¶ Og í tí fimta árinum hjá Jórami Áhabs syni, Ísraels kongi, Jĕ-hō´-sjâ-p<u>h</u>ăt *verandi* tá kongur av Judah, byrjaði Jĕ-hór´-ăm Jĕ-hō´-sjâ-p<u>h</u>ăt-s sonur, Judah kongur, at ríkja.

17 Tríati og tvey ára gamalur var hann, tá ið hann byrjaði at ríkja; og hann ríkti átta ár í Jerusalem.

18 Og hann gekk í vegi konga Ísraels, eins og gjørdi Áhabs hús: tí at dóttir Áhabs var ektakona hansara: og hann gjørdi ilt í eygsjón HARRANS.

19 Tó vildi HARRIN ikki oyða Judah fyri skuld Dávids, tænara síns, eins og hann fyrijáttaði honum at geva honum alveg eitt ljós, *og* til barna hans.

20 ¶ Á hansara døgum gjørdi Ē´-dóm uppreist undan hondini

á Judah, og gjørdu ein kong yvir sær sjálvum.

21 So Jóram fór yvir til Zā´-īr, og allir vagnarnir við honum: og hann reis um nátt*ina,* og sló Ē-dóm-īt´-arnar sum kringsettu hann íkring, og høvuðsmenninar av vagnunum: og fólkið flýddi inn í tjøld síni.

22 Tó gjørdi Ē´-dóm uppreist undan hondini á Judah at hesum degi. Tá gjørdi Līb´-năh uppreist á teirri somu tíð.

23 Og restin av gerningum Jórams, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

24 Og Jóram svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður hjá fedrum sínum í staði Dávids: og Ă-hă-zī´-ăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

25 ¶ Í tí tólvta árinum hjá Jórami Áhabs syni, Ísraels kongi, byrjaði Ă-hă-zī´-ăh Jē-hór´-ăm-s sonur, Judah kongur, at ríkja.

26 Tvey og tjúgu ára gamalur *var* Ă-hă-zī´-ăh, tá ið hann byrjaði at ríkja; og hann ríkti ēitt ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Ăth-ăl´-jăh, dóttir Omrī-s, Ísraels kongs.

27 Og hann gekk í vegi Áhabs húss, og gjørdi ilt í eygsjón HARRANS, eins og *gjørdi* Áhabs hús: tí at hann *var* versonur Áhabs húss.

28 ¶ Og hann fór við Jórami Áhabs syni til kríggið ímóti Hă´-zăă-ĕl, Sýriu kongi, í Rá´-mŏth-gī´-lĕ-ăd; og Sýriulendingarnir særdu Jóram.

29 Og Jóram kongur fór tilbakar at verða grøddur í Jĕz´-rē͡el av sárunum sum Sýriulendingarnir høvdu givið honum í Rá´-măh, tá ið hann bardist ímóti Hă´-zăă-ĕl kongi av Sýriu. Og Ă-hă-zī´-ăh Jē-hór´-ăm-s sonur, kongur av Judah, fór oman at hitta Jóram Áhabs son í Jĕz´-rē͡el, av tí at hann var sjúkur.

KAPITUL 9

OG Ê-lī´-sjă prophetur rópaði ēin av prophe͟ta-børnunum, og segði við hann, Gyrð upp lendar tínar, og tak hesa dós av olju í hond tína, og far til Rá´-mŏth-gī´-lĕ-ăd:

2 Og tá ið tú kemurt hagar, leita upp har Jehu Jē-hō´-sjâ-ph͟ăt-s son Nimsjī-s sonar, og far inn, og fá hann *at* reisast upp burturúr brøðrum sínum, og leið hann til eitt innara kamar;

3 Síðan tak dósina av olju, og hell *hana* á høvur hansara, og sig, Svá sigur HARRIN, eg havi salvað teg *til* kong yvir Ísrael. Síðan opna hurðina, og flýggja, og dvøl ikki.

4 ¶ So hin ungi maðurin, *enntá* hin ungi maðurin, prophe͟turin, fór til Rá´-mŏth-gī´-lĕ-ăd.

5 Og tá ið hann kom, sí, høvuðsmenninir av herliðinum sótu; og hann segði, Eg havi eitt ørindi til tín, O høvuðsmaður. Og Jehu segði, At hvørjum av øllum okkum? Og hann segði, Til tín, O høvuðsmaður.

6 Og hann reistist, og fór inn í húsið; og hann helti oljuna á høvur hansara, og segði við hann, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, eg havi salvað teg *til* kong yvir fólki HARRANS, *enntá* yvir Ísrael.

7 Og tú skalt slá hús Áhabs, meistara tíns, at eg má hevna blóð tænara mína – prophetanna, og blóð alra tænara HARRANS, frá hendi Jĕz´-ĕ-bĕl-s.

8 Tí at alt hús Áhabs skal týnast: og eg vil skera av frá Áhabi hann sum mígur ímóti vegginum, og hann sum er lokaður inni og eftir í Ísrael:

9 Og eg vil gera hús Áhabs líka *sum* hús Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nē´-băt-s sonar, og líka *sum* hús Bă-ăsj´-ă Á´-hī-jăh sonar:

10 Og hundarnir skulu eta Jĕz´-ĕ-bĕl í stykki Jĕz´-rē͡el-s, og *tað skal*

eingin *vera* til at jarða *hana*. Og hann opnaði hurðina, og flýddi.

11 ¶ Tá kom Jehu fram til tænaranna hjá harra sínum: og *ēin* segði við hann, *Er* alt væl *statt?* hvørsvegna kom hesin óði *felagin* til tín? Og hann segði við hann, Tit kenna mannin, og hansara samskifti.

12 Og teir søgdu, *Tað er* falskt; sig okkum nú. Og hann segði, Soleiðis og soleiðis talaði hann til mín, sigandi, Svá sigur HARRIN, eg havi salvað teg *til* kong yvir Ísrael.

13 Tá skundaðu teir *sær,* og tóku hvør maður klæði sítt, og koyrdu *tað* undir seg á toppinum av trappunum, og blástu við lúðrum, sigandi, Jehu er kongur.

14 So Jehu Jē-hō´-sjâ-phăt-s sonur Nimsjī-s sonar samansvór ímóti Jórami. (Nú, Jóram hevði varðað Rá´-mōth-gī´-lē-ăd, hann og allur Ísrael, uppá grund av Hā´-zā-ēl kongi av Sýriu.

15 Men Jóram kongur var farin aftur at verða grøddur í Jēz´-rēel av sárunum sum Sýriulendingarnir høvdu givið honum, tá ið hann bardist við Hā´-zā-ēl kong av Sýriu.) Og Jehu segði, Um tað veri hugar tykkara, *tá* latið ongar fara út *ella* rýma úr staðinum, til at fara og telja *tað* í Jēz´-rēel.

16 So Jehu reið í einum vagni, og fór til Jēz´-rēel; tí at Jóram lá har. Og Ă-hă-zī´-ăh kongur av Judah var komin oman at hitta Jóram.

17 Og tað stóð ein varðmaður á torninum í Jēz´-rēel, og hann speiaði flokkin hjá Jehu, sum hann kom, og segði, Eg síggi ein flokk. Og Jóram segði, Tak ein hestmann, og send at møta teimum, og lat hann siga, *Er tað* friður?

18 So tað fór ēin á hestbaki at møta honum, og segði, Svá sigur kongur, *Er tað* friður? Og Jehu segði, Hvat hevurt tú at gera við frið? vent tær afturum meg. Og varðmaðurin segði frá, sigandi, Sendiboðin kom til teirra, men hann kemur ikki aftur.

19 Tá sendi hann út ein annan á hestbaki, sum kom til teirra, og segði, Svá sigur kongur, *Er tað* friður? Og Jehu svaraði, Hvat hevurt tú at gera við frið? vent tær afturum meg.

20 Og varðmaðurin segði frá, sigandi, Hann kom enntá at teimum, og kemur ikki aftur: og aksturin *er* líka *sum* aksturin hjá Jehu Nimsjī-s syni, tí at hann ekur øðisligani.

21 Og Jóram segði, Ger klárt. Og hansara vagnur varð gjørdur klárur. Og Jóram kongur av Ísrael og Ă-hă-zī´-ăh kongur av Judah fóru út, hvør í sínum vagni, og teir fóru út ímóti Jehu, og møttu honum í stykki Náboths Jēz-rēel-īt´-a.

22 Og tað bar á, tá ið Jóram sá Jehu, at hann segði, *Er tað* friður, Jehu? Og hann svaraði, Hvør friður, so leingi sum hordómar móður tínar, Jēz´-ē-bĕl-ar, og hennara heksakunstir, *eru so* mangir?

23 Og Jóram vendi hondum sínum, og flýddi, og segði til Ă-hă-zī´-ăh, *Tað finst* svikaráð, O Ă-hă-zī´-ăh.

24 Og Jehu dró ein boga við síni fullu styrki, og sló Jē-hór´-ăm ímillum armar hansara, og ørvurin fór út við hjarta hansara, og hann sakk niður í vagni sínum.

25 Tá segði *Jehu* til Bĭd´-kâr-s, høvuðsmans síns, Tak upp, *og* kasta hann í stykkið av akri Náboths Jēz-rēel-īt´-a: tí at minst til, hvussu ið, tá ið eg og tú riðu saman aftaná Áhabi, faðir hansara, legði HARRIN hesa byrði uppá hann;

26 Vissuliga havi eg sæð í gjár blóðið av Nábothi, og blóðið av sonum hansara, sigur HARRIN; og eg vil viðurgjalda tær í hesum

stykkinum, sigur HARRIN. Nú tessvegna, tak *og* kasta hann í *jarðar*stykkið, samsvarandi við orð HARRANS.

27 ¶ Men tá ið Ă-hă-zī´-ăh kongur av Judah sá *hetta,* flýddi hann eftir vegi urtagarðshússins. Og Jehu fylgdi aftaná honum, og segði, Sláið hann eisini í vagninum. *Og teir so gjørdu* við niðanfaringina til Gūr, sum *er* við Ĭb´-lĕ-ăm. Og hann flýddi til Mĕ-gĭd´-dō, og doyði har.

28 Og hansara tænarar førdu hann í einum vagni til Jerusalem, og jarðaðu hann í gravhýsi hansara hjá fedrum hansara í staði Dávids.

29 Og í tí ellivta árinum hjá Jórami Áhabs syni byrjaði Ă-hă-zī´-ăh at ríkja yvir Judah.

30 ¶ Og tá ið Jehu var komin til Jĕz´-rē̆el, hoyrdi Jĕz´-ē-bĕl *um tað;* og hon málaði andlit sítt, og skrýddi høvur sítt, og hugdi út við ein glugga.

31 Og sum Jehu fór inn við portrið, segði hon, *Hevði* Zimrī frið, sum vó meistara sín?

32 Og hann lyfti upp andlit sítt til gluggan, og segði, Hvør *er* á míni síðu? hvør? Og tað hugdu út til hansara tveir *ella* tríggir hirðmenn.

33 Og hann segði, Kastið hana niður. So teir kastaðu hana niður: og *nakað* av blóði hennara varð slett á veggin, og á hestarnar: og hann tróð hana undir fót.

34 Og tá ið hann var komin inn, át hann og drakk, og segði, Far, síggj nú hesa bannaðu *kvinnu,* og jarða hana: tí at hon *er* ein kongsdóttir.

35 Og teir fóru at jarða hana: men teir funnu ikki meir av henni enn skøltin, og føturnar, og handalógvar *hennara.*

36 Hvørsvegna teir komu aftur, og taldu honum. Og hann segði, Hetta *er* orð HARRANS, sum hann talaði við tænara sínum Ê-lī´-jăh Tĭsj-bĭt´-a, sigandi, Í stykki Jĕz´-rē̆el-s skulu hundar eta kjøtið á Jĕz´-ē-bĕl:

37 Og ræið av Jĕz´-ē-bĕl skal vera sum tað uppiá ásjón akursins í stykki Jĕz´-rē̆el-s; *so* at teir skulu ikki siga, Hetta *er* Jĕz´-ē-bĕl.

KAPITUL 10

OG Áhab hevði sjeyti synir í Să-mâr´-ī-ŭ. Og Jehu skrivaði brøv, og sendi til Să-mâr´-ī-ŭ, at stjórnarum Jĕz´-rē̆el-s, til hinna elstu, og til teirra sum aldu upp *børn* Áhabs, sigandi,

2 Nú, so skjótt sum hetta brævið kemur til tykkara, við tað at synir meistara tykkara *eru* hjá tykkum, og *tað eru* hjá tykkum vagnar og hestar, ein girdur staður eisini, og herbúnaður;

3 Leitið enntá upp tann besta og hóskiligasta av sonum meistara tykkara, og setið *hann* á hásæti faðirs hansara, og berjist fyri húsi meistara tykkara.

4 Men teir vórðu framúrliga ræddir, og søgdu, Sí, tveir kongar stóðust ikki frammi fyri honum: hvussu skulu vit tá standast?

5 Og hann sum *var* yvir húsinum, og hann sum *var* yvir staðinum, teir elstu eisini, og uppalarar *barnanna,* sendu til Jehu-s, sigandi, Vit *eru* tænarar tínir, og vilja gera alt sum tú skalt bjóða okkum; vit vilja ikki gera nakran *til* kong: geri tú *tað sum er* gott í eygum tínum.

6 Tá skrivaði hann eitt bræv *fyri* aðru ferð til teirra, sigandi, Um tit *veri* mínir, og *um* tit vilji lýða á rødd mína, takið tit høvdini hjá monnunum, sonum meistara tykkara, og komið til mín til Jĕz´-rē̆el fyri í morgin hesa tíð. Nú, synirnir hjá kongi, *verandi* sjeyti persónar, *vóru* hjá hinum miklu monnum staðarins, sum aldu teir upp.

7 Og tað bar á, tá ið brævið kom til teirra, at teir tóku kongssynirnar, og vógu sjeyti persónar, og koyrdu høvdini hjá teimum í kurvar, og sendu honum *tey* til Jĕz´-rēel.

8 ¶ Og tað kom ein sendiboði, og taldi honum, sigandi, Teir hava ført høvdini av kongssonunum. Og hann segði, Leggið tit tey í tvær rúgvur við innfaringina inn av portrinum inntil morgunin.

9 Og tað bar á um morgunin, at hann fór út, og stóð, og segði til alt fólkið, Tit *veri* rættvísir: sí, eg samansvór ímóti meistara mínum, og vó hann: men hvør vó allar hesar?

10 Vitið nú, at tað skal falla at jørðini einkið av orði HARRANS, sum HARRIN talaði viðvíkjandi húsi Áhabs: tí at HARRIN hevur gjørt *tað* sum hann talaði við tænara sínum, Ê-lī´-jăh.

11 So Jehu vó allar sum vóru eftir av húsi Áhabs í Jĕz´-rēel, og allar miklu menn hansara, og skyldfólk hansara, og prestar hansara, inntil hann eftirlæt honum ongan eftirverandi.

12 ¶ Og hann reistist og fór avstað, og kom til Să-mâr´-ī-ŭ. *Og* sum hann *var* við klippingarhúsið á veginum,

13 Møttist Jehu við brøður Ă-hă-zī´-ăh kongs av Judah, og segði, Hvørjir *eru* tit? Og teir svaraðu, Vit *eru* brøður Ă-hă-zī´-ăh; og vit fara oman at heilsa *uppá* kongsbørnini og drotningarbørnini.

14 Og hann segði, Takið teir livandi. Og teir tóku teir livandi, og vógu teir við holuna av klippingarhúsinum, *enntá* tveir og fjøruti menn; eiheldur eftirlæt hann nakran av teimum.

15 ¶ Og tá ið hann var farin avstað haðani, lendi hann á Jĕ-hón´-ă-dăb-i Rē´-chăb-s syni, *komandi* at møta honum: og hann heilsaði honum, og segði til hansara, Er títt hjarta rætt *vent*, sum hjarta mítt *er* hjá hjarta tínum? Og Jĕ-hón´-ă-dăb svaraði, Tað er. Um tað veri, gev *mær* hond tína. Og hann gav *honum* hond sína; og hann tók hann upp til sín í vagnin.

16 Og hann segði, Kom við mær, og síggj vandlæti mítt fyri HARRAN. So teir fingu hann *at* ríða í vagni hansara.

17 Og tá ið hann kom til Să-mâr´-ī-ŭ, vó hann allar sum vóru eftir hjá Áhabi í Să-mâr´-ī-ŭ, til hann hevði oytt hann, samsvarandi við framsøgn HARRANS, sum hann talaði til Ê-lī´-jăh.

18 ¶ Og Jehu savnaði alt fólkið saman, og segði við teir, Áhab tænti Bā´-ăl-i eitt sindur; *men* Jehu skal tæna honum mikið.

19 Nú tessvegna, kallið at mær allar prophetar Bā´-ăl-s, allar tænarar hans, og allar prestar hans; latið ongan vera vantandi: tí at eg havi eitt mikið sláturoffur *at gera* til Bā´-ăl-s; hvørsumhelst *ið* skal vera vantandi, hann skal ikki liva. Men Jehu gjørdi *tað* í sniðfundni, til teirrar ætlanar, at hann mátti *av*oyða tilbiðjarar Bā´-ăl-s.

20 Og Jehu segði, Lýsið eina hátíðar-samkomu fyri Bā´-ăl-i. Og teir lýstu *hana*.

21 Og Jehu sendi ígjøgnum allan Ísrael: og allir tilbiðjararnir av Bā´-ăl-i komu, so at tað var ikki ein maður eftir, sum kom ikki. Og teir komu inn í hús Bā´-ăl-s; og Bā´-ăl-s hús var fult frá ēinum enda til annan.

22 Og hann segði við hann sum *var* yvir skrúðrúminum, Ber fram búnar til allar tilbiðjarar Bā´-ăl-s. Og hann bar teimum fram búnar.

23 Og Jehu fór, og Jĕ-hón´-ă-dăb Rē´-chăb-s sonur, inn í hús Bā´-ăl-s, og segði við tilbiðjarar Bā´-ăl-s, Kannið, og síggið at tað veri her hjá tykkum eingin av

tænarum HARRANS, men tilbiðjarar Bā´-ăl-s einans.
24 Og tá ið teir fóru inn at ofra sláturoffurˇ og brennioffurˇ, útnevndi Jehu fýrsinstjúgu menn uttanfyri, og segði, *Um* nakar av monnunum, sum eg havi ført inn í hendur tykkara, komist undan, *hann, sum letur hann fara,* hansara lív *skal vera* fyri lívið hjá honum.
25 Og tað bar á, so skjótt sum hann hevði lokið við at ofra brenniofrið, at Jehu segði til lívverjuna og til høvuðsmenninar, Farið inn, *og* vegið teir; latið ongan koma fram. Og teir slógu teir við svørðseggini; og lívverjan og høvuðsmenninir kastaðu *teir* út, og fóru til staðar húsar Bā´-ăl-s.
26 Og teir førdu fram myndirnar út úr húsi Bā´-ăl-s, og brendu tær.
27 Og teir brutu niður mynd Bā´-ăl-s, og brutu niður hús Bā´-ăl-s, og gjørdu tað *til* eitt frárenslushús at hesum degi.
28 Jehu soleiðis oyddi Bā´-ăl úr Ísrael.
29 ¶ Hvussu enn er, *frá* syndum Jĕr-ó´-bō-ăm-s Nē´-băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda, Jehu veik ikki aftaná teimum ífrá, *tað vil siga,* teimum gyltu kálvunum sum *vóru* í Beth-el, og sum *vóru* í Dán.
30 Og HARRIN segði við Jehu, Av tí at tú hevurt gjørt væl í at útinna *tað sum er* rætt í eygum mínum, *og* hevurt gjørt at húsi Ahabs samsvarandi við alt sum *var* í hjarta mínum, skulu børn tíni av tí fjórða *ættarliðinum* sita á trónu Ísraels.
31 Men Jehu gav einkið gætur *eftir* at ganga í lóg HARRANS Guðs Ísraels við øllum hjarta sínum: tí hann veik ikki frá syndum Jĕr-ó´-bō-ăm-s, sum fekk Ísrael at synda.
32 ¶ Í teimum døgum byrjaði HARRIN at skerja Ísrael stutt: og Hā´-zā-ĕl sló teir í øllum breddum Ísraels;
33 Frá Jordan eystanvert, alt land Gileads, Gáditarnar, og Reûbenitarnar, og Mă-năs-sĭt´-arnar, frá Á´-rō-ĕr, sum *er* við ánna Arnon, enntá Gilead og Bá´-sjān.
34 Nú, restin av gerningum Jehu-s, og alt sum hann gjørdi, og allur máttur hansara, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?
35 Og Jehu svav hjá fedrum sínum: og teir jarðaðu hann í Să-mâr´-ĭ-ŭ. Og Jĕ-hó´-ă-hăz, sonur hansara, ríkti í hansara stað.
36 Og tíðin, sum Jehu ríkti yvir Ísrael í Să-mâr´-ĭ-ŭ, *var* tjúgu og átta ár.

KAPITUL 11

OG tá ið Ăth-ăl´-jăh, móðir Ă-hă-zī´-ăh, sá, at sonur hennara var deyður, reistist hon og oyddi alt hitt kongliga sáð.
2 Men Jĕ-hō´-sjĕ-bă, dóttir Jó… kongs, systir til Ă-hă-zī´-ăh, tók Jó´-ăsj Ă-hă-zī´-ăh son, og stjól hann burturúr kongssonunum *sum vórðu* vignir; og tey fjaldu hann, *enntá* hann og fostru hansara, í svøvnkamarinum frá Ăth-ăl´-jŭh, so at hann varð ikki vigin.
3 Og hann var hjá henni fjaldur í húsi HARRANS seks ár. Og Ăth-ăl´-jăh ríkti yvir landinum.
4 ¶ Og tað sjeynda árið sendi Jĕ-hōĭ´-ă-dă og heintaði stjórnararnar yvir hundraðum, við høvuðsmonnunum og lívverjuni, og førdi teir til sín inn í hús HARRANS, og gjørdi ein sáttmála við teir, og tók ein eið av teimum í húsi HARRANS, og sýndi teimum kongssonin.
5 Og hann skipaði teimum, sigandi, Hetta *er* tað tingið sum tit skulu gera; Ein triðjingspartur av tykkum, sum innfara inn á sabbatinum, skulu enntá vera haldarar av vaktini av kongshúsinum;

6 Og ein triðjingspartur *skal vera* við Sūr-s portrið; og ein triðjingspartur við portrið aftanfyri lívverjuna: soleiðis skulu tit halda vaktina av húsinum, at tað verði ei brotið niður.

7 Og tveir partar av øllum tykkum sum fara fram á sabbatinum, enntá teir skulu halda vaktina av húsi HARRANS kring kong.

8 Og tit skulu umringa kong runt umkring, hvør maður við vápnum sínum í hond síni: og hann, sum kemur innum rekkjurnar, lat hann verða vignan: og verið tit hjá kongi, sum hann fer út og sum hann kemur inn.

9 Og høvuðsmenninir yvir hundraðunum gjørdu samsvarandi við øll *ting* sum Jē-hŏĭ´-ă-dă prestur skipaði: og teir tóku hvør maður sínar menn, sum vórðu at koma inn á sabbatinum, við teimum sum skuldu fara út á sabbatinum, og komu til Jē-hŏĭ´-ă-dă prests.

10 Og til høvuðsmenninar yvir hundraðum góvu prestarnir spjótˇ og skildir kong Dávids, sum *vóru* í templi HARRANS.

11 Og lívverjan stóð, hvør maður við vápnum sínum í hond síni, rundan um kong, frá tí høgra hjørninum av templinum til tað vinstra hjørnið av templinum, *yvireftir* við altarið og templið.

12 Og hann førdi fram kongssonin, og setti krúnuna uppá hann, og *gav honum* vitnisburðin; og teir gjørdu hann *til* kong, og salvaðu hann; og teir klappaðu hendur sínar, og søgdu, Guð varði kong.

13 ¶ Og tá ið Ăth-ăl´-jăh hoyrdi ljóðið av lívverjuni *og* av fólkinum, kom hon til fólksins inn í tempul HARRANS.

14 Og tá ið hon hugdi, sí, kongur stóð við eina súlu, eins og háttarlagið *var*, og prinsarnir og lúðramenninir hjáˇ kongi, og alt fólk landsins fegnaðist, og blástu við lúðrum: og Ăth-ăl´-jăh skræddi klæðir síni, og geylaði, Hásvik, Hásvik.

15 Men Jē-hŏĭ´-ă-dă prestur skipaði høvuðsmonnunum av hundraðunum, yvirmonnunum av herliðinum, og segði við teir, Havið hana fram útum rekkjurnar: og hann ið fylgir henni, drepið við svørðinum. Tí at presturin hevði sagt, Latið hana ei verða vigna í húsi HARRANS.

16 Og teir løgdu hendur á hana; og hon fór eftir veginum, eftir hvørjum hestarnir komu inn í kongshúsið: og har varð hon vigin.

17 ¶ Og Jē-hŏĭ´-ă-dă gjørdi ein sáttmála ímillum HARRAN og kong og fólkið, at teir skuldu vera fólk HARRANS; ímillum kong eisini og fólkið.

18 Og alt fólk landsins fór inn í hús Bā´-ăl-s, og brutu tað niður; hans altarˇ og hansara myndir brutu teir í stykkir grundigani, og vógu Măt´-tăn, prest Bā´-ăl-s, frammanfyri altarunum. Og presturin útnevndi yvirmenn yvir hús HARRANS.

19 Og hann tók stjórnararnar yvir hundraðum, og høvuðsmenninar, og lívverjuna, og alt fólk landsins; og teir førdu oman kong frá húsi HARRANS, og komu eftir portursvegi lívverjunnar til húsar kongsins. Og hann sat á hásæti konganna.

20 Og alt fólk landsins fegnaðist, og staðurin var í stilli: og teir vógu Ăth-ăl´-jŭh við svørðinum *við síðuna av* kongshúsinum.

21 Sjey ára gamalur *var* Jē-hó´-ăsj, tá ið hann byrjaði at ríkja.

KAPITUL 12

Í HINUM sjeynda ári Jehu-s byrjaði Jē-hó´-ăsj at ríkja; og fjøruti ár rikti hann í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Zī´-bī-ăh úr Bēēr´-sjē-bŭ.

2 Og Jē-hó´-ăsj gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS allar sínar dagar, í hvørjum Jē-hŏĭ´-ă-dă prestur leiðbeindi honum.

3 Men tey høgu plássini vórðu ei tikin burtur: fólkið sláturofraði og brendi roykilsi enn í teimum høgu plássunum.

4 ¶ Og Jē-hó´-ăsj segði til prestanna, Allur peningurin av teimum vígdu tingunum, sum verður førdur inn í hús HARRANS, *enntá* peningurin av hvørjum tí sum fer framvið *uppteljingini,* peningurin sum hvør maður verður settur til, *og* allur peningurin sum kemur inn í hjarta nakars mans at føra inn í hús HARRANS,

5 Lat prestarnar taka *hann* til sín, hvør maður av kunninga sínum: og lat teir umvæla brestirnar av húsinum, hvarsumhelst *ið* nakar brestur skal verða funnin.

6 Men tað varð *so, at* í hinum trý og tjúgunda ári Jē-hó´-ăsj-ar kongs høvdu prestarnir ikki umvælt brestirnar av húsinum.

7 Tá rópaði Jē-hó´-ăsj kongur Jē-hŏĭ´-ă-dă prest, og *hīnar* prestarnar, og segði við teir, Hví umvæla tit ikki brestirnar av húsinum? nú tessvegna, takið ímóti ongum *meira* peningi av kunninga tykkara, men flýggið hann fyri brestirnar av húsinum.

8 Og prestarnir samtyktu at taka við ongum *meira* peningi av fólkinum, eiheldur at umvæla brestirnar av húsinum.

9 Men Jē-hŏĭ´-ă-dă prestur tók eina kistu, og boraði eitt hol í lokið á henni, og setti hana við síðuna av altarinum, á ta høgru síðuna, sum ēin kemur inn í hús HARRANS: og prestarnir, sum varðaðu hurðina, koyrdu harí allan peningin *sum varð* førdur inn í hús HARRANS.

10 Og tað varð *so,* tá ið teir sóu at *tað var* mikil peningur í kistuni, at skrivarin hjá kongi og høvuðspresturin komu niðan, og teir koyrdu upp í taskur, og taldu peningin sum varð funnin í húsi HARRANS.

11 Og teir góvu peningin, verandi taldur, inn í hendurnar á teimum ið gjørdu arbeiðið, sum høvdu umsjónina av húsi HARRANS: og teir løgdu hann út til træsmiðirnar og byggjararnar, sum arbeiddu uppá hús HARRANS,

12 Og til múrarar, og høggarar av steini, og til at keypa timbur og høgdan stein til at umvæla brestirnar av húsi HARRANS, og til alt sum varð lagt út fyri húsið at umvæla *tað við*.

13 Hvussu enn er, tað vórðu ikki gjørd til hús HARRANS skálir av silvuri, ljósasaksar, kør, lúðrar, nøkur íløt av gulli, ella íløt av silvuri, av peninginum *sum varð* førdur inn í hús HARRANS:

14 Men teir góvu tann til verkamenninar, og umvældu við honum hús HARRANS.

15 Harafturat roknaðu teir ikki *upp* við menninar, inn í hvørs hond teir flýggjaðu peningin til at verða latnan út á verkamenn: tí at teir fóru trúfastligani at.

16 Misbrots-peningurin og syndar-peningurin varð ikki førdur inn í hús HARRANS: hann var prestanna.

17 ¶ Tá fór Hā´-ză-ĕl kongur av Sýriu upp, og bardist ímóti Gáth, og tók tað: og Hā´-ză-ĕl setti sítt andlit til at fara upp til Jerusalem.

18 Og Jē-hó´-ăsj kongur av Judah tók øll tey halgaðu tingini, sum Jē-hō´-sjâ-phăt, og Jē-hór´-ăm, og Á-hă-zĭ´-ăh, fedrar hansara, kongar av Judah, høvdu vígt, og síni egnu halgaðu ting, og alt gullið *sum varð* funnið í dýrgripum HARRANS húss, og í kongshúsinum, og sendi *tað* til Hā´-ză-ĕl-s kongs av Sýriu: og hann fór avstað frá Jerusalem.

19 ¶ Og restin av gerningum Jó´ăsj, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

20 Og hansara tænarar reistust, og gjørdu eina samansvørjing, og vógu Jó´ăsj í húsi Mĭl´lō-s, sum fer oman til Sĭl´lă.

21 Tí at Jó´zăch̲ar Sjĭm´ĕ-ăth-s sonur, og Jĕ-hō´zăbăd Sjō´mĕr-s sonur, tænarar hansara, slógu hann, og hann doyði; og teir jarðaðu hann hjá fedrum hansara í staði Dávids: og Ā-mă-zī´ăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 13

Í TÍ trý og tjúgunda árinum hjá Jó´ăsj Ă-hă-zī´ăh syni, Judah kongi, byrjaði Jĕ-hó´ă-hăz Jehu sonur at ríkja yvir Ísrael í Să-mâr´ĭ-ŭ, *og ríkti* seytjan ár.

2 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, og fylgdi syndum Jĕr-ó´bō-ăm-s Nē´băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda; hann veik ikki harfrá.

3 ¶ Og HARRANS firtni varð kynd ímóti Ísrael, og hann flýggjaði teir inn í hondina á Hă-zăĕl kongi av Sýriu, og inn í hondina á Bĕn-há´dăd Hă´zăĕl-s syni, allar dagar *teirra*.

4 Og Jĕ-hó´ă-hăz bønaði HARRAN, og HARRIN gav gætur at honum: tí hann sá kúgan Ísraels, av tí at kongurin av Sýriu kúgaði teir.

5 (Og HARRIN gav Ísrael ein frelsara, so at teir fóru út undan hondini á Sýriulendingunum: og Ísraels børn dvaldust í tjøldum sínum, eins og áðurfyrr.

6 Hóast hetta, teir viku ikki frá syndunum hjá húsi Jĕr-ó´bō-ăm-s, sum fekk Ísrael *at* synda, *men* gingu harí: og lundin eisini í Să-mâr´ĭ-ŭ varð verandi.)

7 Eiheldur eftirlæt hann av fólkinum til Jĕ-hó´ă-hăz-ar uttan fimti hestmenn, og tíggju vagnar, og tíggju túsund fótmenn; tí at kongurin av Sýriu hevði oytt teir, og hevði gjørt teir sum dustið við tresking.

8 ¶ Nú, restin av gerningum Jĕ-hó´ă-hăz-ar, og alt sum hann gjørdi, og hansara máttur, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

9 Og Jĕ-hó´ă-hăz svav hjá fedrum sínum; og teir jarðaðu hann í Să-mâr´ĭ-ŭ: og Jó´ăsj, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

10 ¶ Í tí tríati og sjeynda árinum hjá Jó´ăsj, Judah kongi, byrjaði Jĕ-hó´ăsj Jĕ-hó´ă-hăz sonur at ríkja yvir Ísrael í Să-mâr´ĭ-ŭ, *og ríkti* sekstan ár.

11 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS; hann veik ikki frá øllum syndum Jĕr-ó´bō-ăm-s Nē´băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda: *men* hann gekk harí.

12 Og restin av gerningum Jó´ăsj, og alt sum hann gjørdi, og hansara máttur, hvarvið hann bardist ímóti Ă-mă-zī´ăh kongi av Judah, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

13 Og Jó´ăsj svav hjá fedrum sínum; og Jĕr-ó´bō-ăm settist uppá hásæti hansara: og Jó´ăsj varð jarðaður í Să-mâr´ĭ-ŭ hjá" kongum Ísraels.

14 ¶ Nú, Ê-lĭ´sjă var fallin sjúkur av sínum sjúkdómi, hvarav hann doyði. Og Jó´ăsj, kongur Ísraels, kom oman at honum, og græt yvir andliti hansara, og segði, O faðir mín, faðir mín, Ísraels vagnur, og hestmenninir harav.

15 Og Ê-lĭ´sjă segði við hann, Tak boga og ørvar. Og hann tók at sær boga og ørvar.

16 Og hann segði til Ísraels kongs, Koyr tína hond uppá bogan. Og hann koyrdi sína hond *uppá hann:* og Ê-lĭ´sjă koyrdi hendur sínar uppá hendur kongs.

17 Og hann segði, Opna gluggan eystureftir. Og hann opnaði *hann*. So segði Ê-lĭ´sjă, Skjót. Og

hann skeyt. Og hann segði, Ørvin av HARRANS útfrían, og ørvin av útfrían frá Sýriu: tí at tú skalt sláa Sýriulendingarnar í Ā′-phĕk, til tú havi uppslúkað *teir*.

18 Og hann segði, Tak ørvarnar. Og hann tók *tær*. Og hann segði við kong Ísraels, Slá uppá jørðina. Og hann sló trísinnis, og steðgaði.

19 Og Guðs maðurin varð vreiður við hann, og segði, Tú skuldirt havt sligið fimm ella seks ferðir; so hevðirt tú sligið Sýriu til tú hevðirt uppslúkað *tað:* hvarafturímóti nú skalt tú sláa Sýriu *bert* trísinnis.

20 ¶ Ê-lī′-sjā doyði, og teir jarðaðu hann. Og liðini hjá Móabitunum herjaðu á landið við innkoming ársins.

21 Og tað bar á, sum teir vóru jarðandi ein mann, at sí, teir bóru eyga við eitt lið *av monnum;* og teir kastaðu mannin inn í gravhýsi Ê-lī′-sjā: og tá ið maðurin var sigin niður, og nam við beinini hjá Ê-lī′-sjā, livnaði hann aftur, og stóð upp á føtur sínar.

22 ¶ Men Hā′-zā-ĕl kongur av Sýriu kúgaði Ísrael allar dagar Jĕ-hó′-ā-hāz-ar.

23 Og HARRIN var náðisamur at teimum, og hevði miskunn á teir, og hevði fyrilit at teimum, uppá grund av sínum sáttmála við Ábraham, Ísaak, og Jákob, og vildi ikki oyða teir, eiheldur kastaði hann teir frá síni nærveru, sum enn *var*.

24 So Hā′-zā-ĕl kongur av Sýriu doyði; og Bĕn-há′-dăd, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

25 Og Jĕ-hó′-ā-sj Jĕ-hó′-ā-hāz-ar sonur tók aftur út úr hondini á Bĕn-há′-dăd-i Hā′-zā-ĕl-s syni staðirnar, sum hann hevði tikið út úr hondini á Jĕ-hó′-ā-hāz-i, faðir hansara, við kríggi. Tríggjar ferðir sló Jó′-āsj hann, og endurvann staðirnar av Ísrael.

KAPITUL 14

Í ØÐRUM árinum hjá Jó′-āsj Jĕ-hó′-ā-hāz syni, kongi av Ísrael, ríkti Ā-mă-zī′-āh, sonur Jó′-āsj, Judah kongur.

2 Hann var tjúgu og fimm ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja, og ríkti tjúgu og níggju ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Jĕ-hó′-ăd-dăn, úr Jerusalem.

3 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, tó ikki líka *sum* Dávid, faðir hansara: hann gjørdi samsvarandi við øll ting eins og Jó′-āsj, faðir hansara, gjørdi.

4 Hvussu enn er, tey høgu plássini vórðu ei tikin burtur: sum enn *var* sláturofraði fólkið og brendi roykilsi á teimum høgu plássunum.

5 ¶ Og tað bar á, so skjótt sum kongadømið var støðufest í hond hansara, at hann vá sínar tænarar, sum høvdu vigið kong, faðir hansara.

6 Men børnini hjá myrðarunum vá hann ikki: sambært tí sum er skrivað í bók lógar Móse, í hvørji HARRIN ábeyð, sigandi, Fedrarnir skulu ikki verða tiknir av lívi fyri børnini, ella børnini verða tikin av lívi fyri fedrarnar; men hvør maður skal verða tikin av lívi fyri sína egnu synd.

7 Hann vó av Ē′-dóm í saltsdalinum tíggju túsund, og tók Sē′-lâh við kríggi, og kallaði navnið á tí Jŏk′-thēēl at hesum degi.

8 ¶ Tá sendi Ā-mă-zī′-āh sendiboðar til Jĕ-hó′-āsj-ar Jĕ-hó′-ā-hāz-ar sonar, Jehu-s sonar, kongs av Ísrael, sigandi, Kom, latum okkum hyggja hvør annan í andlitið.

9 Og Jĕ-hó′-āsj kongur av Ísrael sendi til Ā-mă-zī′-āh kongs av Judah, sigandi, Tistilin, sum *var* í Lī′-bă-nŏn, sendi til sedris*træið* sum

var í Lĭ´-bă-nŏn, sigandi, Gev dóttur tína til sonar míns til ektakonu: og tað fór framvið eitt vilt villdjór, *sum* var í Lĭ´-bă-nŏn, og tróð niður tistilin.

10 Tú hevurt veruliga sligið Ē´-dóm, og títt hjarta hevur lyft teg upp: dýrdast *um hetta,* og bíða við hús: tí at hví skuldirt tú blandað *teg* uppí til skaða *tín,* at tú skuldirt fallið, *enntá* tú, og Judah við tær?

11 Men Ă-mă-zī´-ăh vildi ikki hoyra. Jĕ-hó´-ăsj kongur av Ísrael tessvegna fór upp; og hann og Ă-mă-zī´-ăh kongur av Judah litu hvør annan í andlitið í Bĕth´-sjê-mĕsj, sum *hoyrir* til Judah.

12 Og Judah varð sett til hins verra frammi fyri Ísrael; og teir flýddu hvør maður til tjalda sína.

13 Og Jĕ-hó´-ăsj kongur av Ísrael tók Ă-mă-zī´-ăh kong av Judah, Jĕ-hó´-ăsj-ar son Ă-hă-zī´-ăh sonar, í Bĕth´-sjê-mĕsj, og kom til Jerusalem, og breyt niður Jerusalems múr frá Ē´-phră-ĭm-s-portrinum at hjørna-portrinum, fýra hundrað alnir.

14 Og hann tók alt gullið og silvurið, og øll íløtini sum vórðu funnin í húsi HARRANS, og í dýrgripa*goymsl*um kongshússins, og gíslar, og fór aftur til Să-mâr´-ĭ-ŭ.

15 ¶ Nú, restin av gerningum Jĕ-hó´-ăsj-ar sum hann gjørdi, og hansara máttur, og hvussu hann bardist við Ă-mă-zī´-ăh kong av Judah, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

16 Og Jĕ-hó´-ăsj svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður í Să-mâr´-ĭ-ŭ hjá″ kongunum av Ísrael; og Jĕr-ó´-bô-ăm, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

17 ¶ Og Ă-mă-zī´-ăh, sonur Jó´-ăsj, kongur av Judah, livdi eftir deyða Jĕ-hó´-ăsj Jĕ-hó´-ă-hăz-ar sonar, Ísraels kongs, fimtan ár.

18 Og restin av gerningum Ă-mă-zī´-ăh, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

19 Nú, teir gjørdu eina samansvørjing ímóti honum í Jerusalem: og hann flýddi til Lá´-chĭsj; men teir sendu eftir honum til Lá´-chĭsj, og vógu hann har.

20 Og teir førdu hann á hestum: og hann varð jarðaður í Jerusalem hjá″ fedrum sínum í staði Dávids.

21 ¶ Og alt fólkið av Judah tók Â-zăr´-jăh, sum *var* sekstan ára gamalur, og gjørdu hann *til* kong ístaðin fyri faðir hansara, Ă-mă-zī´-ăh.

22 Hann bygdi Ē´-lăth, og endurbøtti tað til Judah, eftir at kongur svav hjá fedrum sínum.

23 ¶ Í tí fimtanda árinum hjá Ă-mă-zī´-ăh, syni Jó´-ăsj, kongi av Judah, byrjaði Jĕr-ó´-bô-ăm, sonur Jó´-ăsj, kongur av Ísrael, at ríkja í Să-mâr´-ĭ-ŭ, *og ríkti* fjøruti og ĕitt ár.

24 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS: hann veik ikki frá øllum syndum Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nĕ´-băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda.

25 Hann veitti aftur bredda Ísraels frá innfaring Há´-măth-s at sjógvi slættarins, samsvarandi við orð HARRANS Guðs Ísraels, hvørt hann talaði við^ hendi tænara síns Jónah Ă-mĭt´-tâ-ĭ-s sonar, prophetsins, sum *var* úr Gáth-hĕ´-phĕr.

26 Tí at HARRIN sá nívd Ísraels, *at hon var* sera beisk: tí at *tað var* ikki nakar lokaður inni, ella nakar eftir, ella nakar hjálpari hjá Ísrael.

27 Og HARRIN segði ikki, at hann vildi sletta út navn Ísraels undan himni: men hann frelsti teir við^ hendi Jĕr-ó´-bô-ăm-s, sonar Jó´-ăsj.

28 ¶ Nú, restin av gerningum Jĕr-ó´-bô-ăm-s, og alt sum hann

gjørdi, og hansara máttur, hvussu hann kríggjaðist, og hvussu hann endurvann Damascus, og Há´măth, *sum hoyrdu* til Judah, fyri Ísrael, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

29 Og Jĕr-ó´-bô-ăm svav hjá fedrum sínum, *enntá* hjá kongum Ísraels; og Zăch-ăr´-jăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 15

Í HINUM tjúgu og sjeynda ári Jĕr-ó´-bô-ăm-s kongs av Ísrael, byrjaði Â-zăr´-jăh Ă-mă-zĭ´-ăh sonur, Judah kongur, at ríkja.

2 Sekstan ára gamalur var hann, tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti tvey og fimti ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Jĕch-ô-lĭ´-ăh, úr Jerusalem.

3 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, samsvarandi við alt sum faðir hansara, Ă-mă-zĭ´-ăh, hevði gjørt;

4 Uttan at tey høgu plássini vórðu ikki burturtikin: fólkið sláturofraði og brendi roykilsi enn á teimum høgu plássunum.

5 ¶ Og HARRIN sló kong, so at hann var ein spitalskur at degi deyða síns, og dvaldist í einum atskildum húsi. Og Jó´-thăm, kongssonurin, *var* yvir húsinum, dømandi fólk landsins.

6 Og restin av gerningum Â-zăr´-jăh, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

7 So Â-zăr´-jăh svav hjá fedrum sínum; og teir jarðaðu hann hjá fedrum hansara í staði Dávids: og Jó´-thăm, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

8 ¶ Í hinum tríati og áttunda ári Â-zăr´-jăh kongs av Judah, ríkti Zăch-ăr´-jăh Jĕr-ó´-bô-ăm-s sonur yvir Ísrael í Să-mâr´-ĭ-ŭ seks mánaðir.

9 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, eins og fedrar hansara høvdu gjørt: hann veik ikki frá syndum Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nĕ´-băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda.

10 Og Sjăl´-lŭm Já´-bĕsj-ar sonur samansvór ímóti honum, og sló hann frammi fyri fólkinum, og vó hann, og ríkti í hansara stað.

11 Og restin av gerningum Zăch-ăr´-jăh, sí, teir *eru* skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga.

12 Hetta *var* orð HARRANS, sum hann talaði við Jehu, sigandi, Tínir synir skulu sita á hásæti Ísraels at hinum fjórða *ættarliði*. Og soleiðis bar tað á.

13 ¶ Sjăl´-lŭm Já´-bĕsj-ar sonur byrjaði at ríkja í hinum níggju og tríatiunda ári Ŭz´-zĭ-ăh kongs av Judah; og hann ríkti ein fullan mánað í Să-mâr´-ĭ-ŭ.

14 Tí at Mĕn´-ă-hĕm Gá´-dĭ-s sonur fór upp frá Tĭr´-zăh, og kom til Să-mâr´-ĭ-ŭ, og sló Sjăl´-lŭm Já´-bĕsj son í Să-mâr´-ĭ-ŭ, og vó hann, og ríkti í hansara stað.

15 Og restin av gerningum Sjăl´-lŭm-s, og hansara samansvørjing sum hann gjørdi, sí, teir *eru* skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga.

16 ¶ Tá sló Mĕn´-ă-hĕm Tĭph´-săh, og allar sum *vóru* harí, og breddar tess frá Tĭr´-zăh: av tí at teir lótu ikki upp *fyri honum*, tí sló hann *tað; og* allar kvinnurnar harí, sum vóru við barn, spretti hann upp.

17 Í hinum níggju og tríatiunda ári Â-zăr´-jăh kongs av Judah byrjaði Mĕn´-ă-hĕm Gá´-dĭ-s sonur at ríkja yvir Ísrael, *og ríkti* tíggju ár í Să-mâr´-ĭ-ŭ.

18 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS: hann veik ikki allar sínar dagar frá syndum Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nĕ´-băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda.

19 *Og* Pŭl, kongur Assýriu, kom ímóti landinum: og Mĕn´-ă-hĕm gav Pŭli eitt túsund talentir

av silvuri, at hansara hond mátti vera við honum til at staðfesta kongadømið í hond síni.

20 Og Měn´-ă-hěm kravdi peningin av Ísrael, *enntá* av øllum teimum mektigu ríkidømismonnunum, av hvørjum manni fimti sjē´-kl-ar av silvuri, at geva til kongsins av Assýriu. So kongurin av Assýriu vendi tilbakar, og steðgaði ikki har í landinum.

21 ¶ Og restin av gerningum Měn´-ă-hěm-s, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga?

22 Og Měn´-ă-hěm svav hjá fedrum sínum; og Pěk-ă-hī´-ăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

23 ¶ Í hinum fimtiunda ári Â-zăr´-jăh kongs av Judah byrjaði Pěk-ă-hī´-ăh Měn´-ă-hěm-s sonur at ríkja yvir Ísrael í Să-mâr´-ĭ-ŭ, *og ríkti* tvey ár.

24 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS: hann veik ikki frá syndum Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nē´-băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda.

25 Men Pē´-kăh Rĕ-măl´-jăh sonur, ein høvuðsmaður hjá honum, samansvór ímóti honum, og sló hann í Să-mâr´-ĭ-ŭ, í slotti kongshússins, við Âr´-gŏb-i og Ăr´-ĭ-ēh, og við honum fimti menn av Gileaditunum: og hann drap hann, og ríkti í hansara rúm.

26 Og restin av gerningum Pěk-ă-hī´-ăh, og alt sum hann gjørdi, sí, teir *eru* skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga.

27 ¶ Í hinum tvey og fimtiunda ári Â-zăr´-jăh kongs av Judah, byrjaði Pē´-kăh Rĕ-măl´-jăh sonur at ríkja yvir Ísrael í Să-mâr´-ĭ-ŭ, *og ríkti* tjúgu ár.

28 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS: hann veik ikki frá syndum Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nē´-băt-s sonar, sum fekk Ísrael at synda.

29 Á døgum Pē´-kăh kongs av Ísrael kom Tĭg´-lăth-pî-lē´-sĕr, Assýriu kongur, og tók Ĭ´-jŏn, og Á´-bĕl-bĕth-mā´-ă-châh, og Jă-nō´-ăh, og Kē´-dĕsj, og Hā´-zôr, og Gilead, og Galilēu, alt land Năph´-tâ-lī-s, og bar teir *til* fanga til Assýriu.

30 Og Hó-sjē´-ă Ē´-lăh sonur gjørdi eina samansvørjing ímóti Pē´-kăh Rĕ-măl´-jăh syni, og sló hann, og vó hann, og ríkti í hansara stað, í hinum tjúgunda ári Jó´-thăm-s Ŭz´-zī-ăh sonar.

31 Og restin av gerningum Pē´-kăh, og alt sum hann gjørdi, sí, teir *eru* skrivaðir í bók krýnikna Ísraels konga.

32 ¶ Í øðrum ári Pē´-kăh Rĕ-măl´-jăh sonar, Ísraels kongs, byrjaði Jó´-thăm Ŭz´-zī-ăh sonur, Judah kongur, at ríkja.

33 Fimm og tjúgu ára gamalur var hann, tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti sekstan ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Jĕ-rū´-sjă Zā´-dŏk-s dóttir.

34 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS: hann gjørdi samsvarandi við alt sum faðir hansara, Ŭz´-zī-ăh, hevði gjørt.

35 ¶ Hvussu enn er, tey høgu plássini vórðu ikki burturtikin: fólkið sláturofraði og brendi reykilsi enn í teimum høgu plássunum. Hann bygdi hitt hægra portrið av húsi HARRANS.

36 ¶ Nú, restin av gerningum Jó´-thăm-s, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

37 Í teimum døgum byrjaði HARRIN at senda ímóti Judah Rē-zīn, Sýriu kong, og Pē´-kăh Rĕ-măl´-jăh son.

38 Og Jó´-thăm svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður hjá fedrum sínum í staði Dávids, faðirs síns: og Áhaz, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 16

Í HINUM seytjanda ári Pē´kăh Rĕ-măl´jăh sonar, byrjaði Áhaz Jó´thăm-s sonur, Judah kongur, at ríkja.

2 Tjúgu ára gamalur *var* Áhaz, tá ið hann byrjaði at ríkja, og ríkti sekstan ár í Jerusalem, og gjørdi ikki *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS Guðs síns, líka *sum* Dávid, faðir hansara.

3 Men hann gekk í vegi Ísraels konga, ja, og fekk son sín at fara ígjøgnum eldin, samsvarandi við andstygdir heidninganna, hvørjar HARRIN kastaði út frammi undan børnum Ísraels.

4 Og hann sláturofraði og brendi roykilsi í teimum høgu plássunum, og á heyggjunum, og undir hvørjum grønum træi.

5 ¶ Tá komu Rē´zĭn kongur av Sýriu, og Pē´kăh Rĕ-măl´jăh sonur, Ísraels kongur, niðan til Jerusalem at kríggjast: og teir kringsettu Áhaz, men kundu ikki yvirvinna *hann*.

6 Á teirri tíð endurvann Rē´zĭn kongur av Sýriu Ē´lăh til Sýriulands, og rak Jødarnar frá Ē´lăth: og Sýriulendingarnir komu til Ē´lăth, og dvaldust har at hesum degi.

7 So Áhaz sendi sendiboðar til Tĭg´lăth-pî-lē´sĕr-s kongs av Assýriu, sigandi, Eg *eri* tænari tín og sonur tín: kom upp, og bjarga mær út úr hondini á kongi Sýriu, og út úr hondini á kongi Ísraels, sum rísa upp ímóti mær.

8 Og Áhaz tók silvurið og gullið, sum varð funnið í húsi HARRANS, og í dýrgripa*goymsl*um kongshússins, og sendi *tað til* eina gávu til kongsins av Assýriu.

9 Og kongurin av Assýriu gav gætur at honum: tí at kongurin av Assýriu fór upp ímóti Damascus, og tók tað, og førdi *fólkið av* tí *til* fanga til Kîr, og vó Rē´zĭn.

10 ¶ Og kong Áhaz fór til Damascus at hitta Tĭg´lăth-pî-lē´sĕr kong av Assýriu, og sá eitt altar, sum *var* í Damascus: og kong Áhaz sendi til Ū´rī-jăh prests sniðið á altarinum, og mynstrið á tí, samsvarandi við alt handverk tess.

11 Og Ū´rī-jăh prestur bygdi eitt altar samsvarandi við alt sum kong Áhaz hevði sent frá Damascus: so Ū´rī-jăh prestur gjørdi *tað* ímóti *tí at* kong Áhaz kom frá Damascus.

12 Og tá ið kongur var komin frá Damascus, sá kongur altarið: og kongur nærkaðist til altarið, og ofraði hará.

13 Og hann brendi brennioffur sítt og matoffur sítt, og helti drykkoffur sítt, og sletti blóðið av friðofrum sínum, uppá altarið.

14 Og hann førdi eisini messing altarið, sum *var* frammi fyri HARRANUM, frá tí fremsta av húsinum, frá ímillum altarið og hús HARRANS, og setti tað á norður síðuna av altarinum.

15 Og kong Áhaz skipaði Ū´rī-jăh presti, sigandi, Uppiá tí mikla altarinum brenn morgun brenniofrið, og kvøld matofrið, og brenni-sláturoffur kongsins, og hansara matoffur, við brenniofrinum hjá øllum fólki landsins, og matofri teirra, og drykkofrum teirra; og slett uppá tað alt blóðið av brenniofrinum, og alt blóðið av sláturofrinum: og messing altarið skal vera til mín at fregna *hjá*.

16 Svá gjørdi Ū´rī-jăh prestur, samsvarandi við alt sum Áhaz kongur ábeyð.

17 ¶ Og kong Áhaz skar av tromirnar av undirstøðunum, og tók burtur tváttarkerið oman av teimum; og tók niður sjógvin oman av messing oksunum, sum *vóru* undir tí, og setti tað uppá eina seting av steinum.

18 Og skýlið til sabbatin, sum
teir høvdu bygt í húsinum, og
kongsins inngongd uttanfyri,
vendi hann frá húsi HARRANS fyri
kongin av Assýriu.
19 ¶ Nú, restin av gerningum
Áhazar, sum hann gjørdi, *eru* teir
ikki skrivaðir í bók krýnikna Jud-
ah konga?
20 Og Áhaz svav hjá fedr-
um sínum, og varð jarðaður hjá
fedrum sínum í staði Dávids: og
Hëz-ë-kĭ´-ăh, sonur hansara, ríkti í
hansara stað.

KAPITUL 17

Í HINUM tólvta ári Áhazar
kongs av Judah byrjaði Hó-
sjē´-ă Ē´-lăh sonur at ríkja í Să-
mâr´-ĭ-ŭ yvir Ísrael níggju ár.
2 Og hann gjørdi *tað sum* ilt
var í eygsjón HARRANS, men ikki
eins og kongarnir av Ísrael, sum
vóru undan honum.
3 ¶ Ímóti honum kom upp
Sjăl-măn-ē´-sĕr kongur av Assýriu;
og Hó-sjē´-ă gjørdist tænari hans-
ara, og gav honum gávur.
4 Og kongurin av Assýriu fann
samansvørjing í Hó-sjē´-ă: tí at
hann hevði sent sendiboðar til
Sō-s, Egyptalands kongs, og førði
onga gávu til kongsins av Assýriu,
eins og *hann hevði gjørt* ár um ár:
kongurin av Assýriu tessvegna
lokaði hann inni, og bant hann í
fongsli.
5 ¶ Tá kom upp kongurin av
Assýriu út gjøgnum alt landið, og
fór upp til Să-mâr´-ĭ-ŭ, og kring-
setti tað trý ár.
6 ¶ Í tí níggjunda árinum hjá
Hó-sjē´-ă tók kongurin av Assýriu
Să-mâr´-ĭ-ŭ, og bar Ísrael burtur
inn í Assýriu, og staðsetti teir í
Hā´-lâh og í Hā´-bôr *við* Gō´-zăn-s
ánna, og í staðunum hjá Mediu-
*monn*unum.
7 Tí at *soleiðis* varð tað, at
Ísraels børn høvdu syndað ímóti
HARRANUM Guði sínum, sum
hevði ført teir upp út úr Egypta-
landi, frá *at vera* undir hendi
Pharaohs, Egyptalands kongs, og
høvdu óttast aðrar gudar,
8 Og gingið í ásetingum hinna
heidnu, hvørjar HARRIN kastaði
út frammi undan børnum Ísraels,
og hjá kongunum av Ísrael, sum
teir høvdu gjørt.
9 Og Ísraels børn gjørdu loyni-
liga *hasi* tingini sum *vóru* ikki
rætt ímóti HARRANUM Guði sín-
um, og teir bygdu sær høg pláss
í øllum staðum sínum, frá varð-
mannatorninum til hins *víg*girda
staðar.
10 Og teir settu sær upp mynd-
ir og lundir á hvørjum høgum
heyggi, og undir hvørjum grøn-
um træi:
11 Og har brendu teir roykilsi
í øllum teimum høgu plássunum,
eins og *gjørdu* teir heidnu, hvørj-
ar HARRIN førdi burtur undan
teimum; og virkaðu vond ting til
at tirra HARRAN til firtnis:
12 Tí at teir tæntu avgudum,
hvarum HARRIN hevði sagt við
teir, Tit skulu ikki gera hetta
tingið.
13 HARRIN tó vitnaði ímóti
Ísrael, og ímóti Judah, við øll-
um prophetunum, *og við* øllum
síggjarunum, sigandi, Vendið tit
frá illu vegum tykkara, og haldið
boðini hjá mær *og* ásetingar mín-
ar, samsvarandi við alla lógina
sum eg ábjóðaði fedrum tykk-
ara, og sum eg sendi til tykkara
við tænarum mínum, prophet-
unum.
14 Hóast hetta, teir vildu ikki
hoyra, men herdu svírar sínar líkt
við svírar fedra sína, sum trúðu
ikki á HARRAN Guð sín.
15 Og teir havnaðu ásetingum
hansara, og hansara sáttmála
sum hann gjørdi við fedrar teirra,
og hansara vitnisburðum sum
hann vitnaði ímóti teimum; og
teir fylgdu fáfongd, og gjørdust

fáfongdir, og fóru aftaná teimum heidnu sum *vóru* runt umkring teir, *viðvíkjandi* hvørjum HARRIN hevði álagt teimum, at teir skuldu ikki gera líka *sum* teir.

16 Og teir fóru frá øllum boðunum hjá HARRANUM Guði sínum, og gjørdu sær bræddar myndir, *enntá* tveir kálvar, og gjørdu eina lund, og tilbóðu alt herlið himins, og tæntu Bă´ăl-i.

17 Og teir voldu sonum sínum og døtrum sínum at fara ígjøgnum eldin, og brúktu spásigarí og rúnagandanir, og seldu seg sjálvar til at gera ilt í eygsjón HARRANS, til at tirra hann til firtnis.

18 HARRIN tí var sera firtin við Ísrael, og burtflutti teir út úr eygsjón síni: tað var eingin eftir uttan ættargrein Judah einans.

19 Eisini Judah helt ikki boðini hjá HARRANUM Guði teirra, men gingu í ásetingum Ísraels, sum teir gjørdu.

20 Og HARRIN havnaði øllum sáði Ísraels, og nívdi teir, og flýggjaði teir inn í hondina á rænarum, inntil hann hevði kastað teir út úr eygsjón síni.

21 Tí at hann skræddi Ísrael frá húsi Dávids; og teir gjørdu Jĕr-ó´-bô-ăm Nĕ´-băt-s son *til* kong: og Jĕr-ó´-bô-ăm dreiv Ísrael frá at fylgja HARRANUM, og fekk teir *at* synda eina mikla synd.

22 Tí at Ísraels børn gingu í øllum syndum Jĕr-ó´-bô-ăm-s, sum hann gjørdi; teir viku ei frá teimum;

23 Inntil HARRIN burtflutti Ísrael út úr eygsjón síni, eins og hann hevði sagt við^ øllum tænarum sínum, prophetunum. So varð Ísrael borið burtur út úr egna landi teirra til Assýriu at hesum degi.

24 ¶ Og kongurin av Assýriu førdi *menn* frá Bábylon, og frá Cŭ´-thăh, og frá Ă´-vă, og frá Há´-măth, og frá Sê-phâr´-vâ-ïm, og staðsetti *teir* í staðunum av Să-mâr´-ï-ŭ ístaðin fyri børn Ísraels: og teir ognaðust Să-mâr´-ï-ŭ, og dvaldust í staðum tess.

25 Og *soleiðis* varð tað við byrjanina av teirra búgving har, *at* teir óttaðust ikki HARRAN: HARRIN tessvegna sendi leyvur teirra millum, sum banaðu *summum* av teimum.

26 Hvørsvegna teir talaðu til kongsins av Assýriu, sigandi, Tjóðirnar sum tú hevurt burtflutt, og staðsett í staðunum av Să-mâr´-ï-ŭ, kenna ikki háttarlag Guðs landsins: hann tessvegna hevur sent leyvur teirra millum, og sí, tær bana teimum, av tí at teir kenna ikki háttarlag Guðs landsins.

27 Tá skipaði kongurin av Assýriu, sigandi, Førið hagar ēin av prestunum, hvørjar tit førdu haðani frá; og lat teir fara og dvøljast har, og lat hann læra teir háttarlag Guðs landsins.

28 Tá kom ēin av prestunum, hvørjar teir høvdu ført burtur frá Să-mâr´-ï-ŭ, og dvaldist í Beth-el, og frálærdi teimum, hvussu teir skuldu óttast HARRAN.

29 Hvussu enn er, hvør tjóð gjørdi gudar síns egins, og settu *teir* í húsini av teimum høgu plássunum sum Să-măr-ï-tān´-ararnir høvdu gjørt, hvør tjóð í staðum sínum, hvarí teir dvaldust.

30 Og menninir úr Bábylon gjørdu Sŭc´-cōth-bĕ´-nōth, og menninir úr Cŭth gjørdu Nĕr´-găl, og menninir úr Há´-măth gjørdu Á´-sjï-mă,

31 Og Á-vït´-arnir gjørdu Nïb´-hăz og Tartak, og Sê-phâr-vït´-arnir brendu børn síni í eldi til Ă-drăm´-mĕ-lĕch-s og Ă-năm´-mĕ-lĕch-s, guda Sê-phâr´-vâ-ïm-s.

32 So teir óttaðust HARRAN, og gjørdu sær sjálvum av teimum lægstu av teimum prestar av

teimum høgu plássunum, sum sláturofraðu fyri teir í húsunum av teimum høgu plássunum.

33 Teir óttaðust HARRAN, og tæntu sínum egnu gudum, eftir háttarlaginum hjá tjóðunum, sum teir førdu burtur haðani frá.

34 At hesum degi gera teir eftir hinum fyrru háttarløgunum: teir óttast ikki HARRAN, eiheldur gera teir eftir ásetingum sínum, ella eftir regluskipanum sínum, ella eftir lógini og boðunum sum HARRIN ábjóðaði børnum Jákobs, hvønn hann nevndi Ísrael;

35 Við hvørjar HARRIN hevði gjørt ein sáttmála, og álagt teim, sigandi, Tit skulu ikki óttast aðrar gudar, ella boyggja tykkum sjálvar til teirra, ella tæna teimum, ella sláturofra til teirra:

36 Men HARRAN, sum førdi tykkum upp út úr Egyptalandi við miklari kraft og einum útstrektum armi, hann skulu tit óttast, og hann skulu tit tilbiðja, og til hansara skulu tit gera sláturoffur.

37 Og ásetingunum, og regluskipanunum, og lógini, og boðinum, sum hann skrivaði til tykkum, skulu tit geva ans *eftir* at gera um ævirmeir; og tit skulu ikki óttast aðrar gudar.

38 Og sáttmálan, sum eg havi gjørt við tykkum, skulu tit ikki gloyma; eiheldur skulu tit óttast aðrar gudar.

39 Men HARRAN Guð tykkara skulu tit óttast; og hann skal útfría tykkum út úr hondini á øllum fíggindum tykkara.

40 Hvussu enn er, teir góvu ikki gætur, men teir gjørdu eftir teirra fyrra háttarlagi.

41 So hesar tjóðir óttaðust HARRAN, og tæntu sínum ristu myndum, bæði teirra børn, og teirra barnabørn: eins og gjørdu fedrar teirra, soleiðis gera teir at hesum degi.

KAPITUL 18

NÚ, tað bar á í tí triðja árinum hjá Hó-sjē´-ă Ē´-lăh syni, Ísraels kongi, *at* Hĕz-ē-kī´-ăh Áhaz sonur, Judah kongur, byrjaði at ríkja.

2 Tjúgu og fimm ára gamalur var hann, tá ið hann byrjaði at ríkja; og hann ríkti tjúgu og níggju ár í Jerusalem. Navn móður hansara eisini *var* Ábī Zăch-ăr´-jăh dóttir.

3 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, samsvarandi við alt sum Dávid, faðir hansara, gjørdi.

4 ¶ Hann tók burtur hini høgu pláss, og breyt myndirnar, og skar niður lundirnar, og breyt í stykkir messing høggormin sum Móses hevði gjørt: tí at at teimum døgum brendu Ísraels børn roykilsi til hansara: og hann kallaði hann Nê-hŭsj´-tăn.

5 Hann leit á HARRAN Guð Ísraels; so at aftaná hann var eingin líka *sum* hann millum alra konga Judah, ella *nakrir* sum vóru áðrenn hann.

6 Tí hann krøktist til HARRANS, *og* veik ikki frá at fylgja honum, men helt boðini hjá honum, sum HARRIN ábjóðaði Mósesi.

7 Og HARRIN var við honum; *og* hann framgekk hvagarsumhelst hann fór út: og hann gjørdi uppreist ímóti konginum av Assýriu, og tænti honum ikki.

8 Hann sló Philistarnar, *enntá* at Gaza, og breddum tess, frá varðmannatorninum til hins *víg*girda staðar.

9 ¶ Og tað bar á í tí fjórða árinum hjá Hĕz-ē-kī´-ăh kongi, sum *var* tað sjeynda árið hjá Hó-sjē´-ă Ē´-lăh syni, Ísraels kongi, *at* Sjălmăn-ē´-sĕr kongur av Assýriu kom upp ímóti Să-mâr´-ĭ-ŭ, og kringsetti tað.

10 Og við endan á trimum ár-

um tóku teir tað: *enntá* í tí sætta árinum hjá Hëz-ë-kī´-ăh, tað *er* tað níggjunda árið hjá Hó-sjē´-ă kongi av Ísrael, varð Să-mâr´-ī-â tikið.

11 Og kongurin av Assýriu førdi burt Ísrael til Assýriu, og setti teir í Hā´-lâh og í Hā´-bôr *við* Gō´-zăn-s ánna, og í staðunum hjá Mediu*monn*unum:

12 Av tí at teir lýddu ikki rødd HARRANS Guðs síns, men misbrutu sáttmála hans, *og* alt sum Móses, tænari HARRANS, ábeyð, og vildu ikki hoyra *tey,* ella gera *tey*.

13 ¶ Nú, í hinum fjúrtanda ári Hëz-ë-kī´-ăh kongs, kom Sën-năch´-ër-īb kongur av Assýriu upp ímóti øllum teimum *víg*girdu staðunum av Judah, og tók teir.

14 Og Hëz-ë-kī´-ăh kongur av Judah sendi til kongsins av Assýriu til Lá´-chīsj, sigandi, Eg havi forbrotist; vend aftur frá mær: tað, sum tú leggurt á meg, vil eg bera. Og kongurin av Assýriu ásetti Hëz-ë-kī´-ăh kongi av Judah trý hundrað talentir av silvuri og tríati talentir av gulli.

15 Og Hëz-ë-kī´-ăh gav *honum* alt silvurið sum varð funnið í húsi HARRANS, og í dýrgripa*goymsl*um kongshússins.

16 Á teirri tíð skar Hëz-ë-kī´-ăh av *gullið frá* hurðunum av templi HARRANS, og *frá* súlunum sum Hëz-ë-kī´-ăh kongur av Judah hevði yvirklætt, og gav tað til Assýriu kongsins.

17 ¶ Og kongurin av Assýriu sendi Tartan og Răb´-să-rīs og Răb´-sjă-kēh frá Lá´-chīsj til Hëz-ë-kī´-ăh kongs við einum miklum herliði ímóti Jerusalem. Og teir fóru upp og komu til Jerusalem. Og tá ið teir vóru komnir niðan, komu teir og stóðu hjá vatnleiðingini av tí ovara hylinum, sum *er* á høvuðsveginum av akri *klædna*reinsarans.

18 Og tá ið teir høvdu kallað til kongsins, kom tað út til teirra Ē´-lī-ă-kīm Hīl´-kī-ăh sonur, sum *var* yvir húshaldinum, og Sjëb´-nă — skrivarin, og Jó´-âh Á´-săph-s sonur — skrásetarin.

19 Og Răb´-sjă-kēh segði við teir, Talið tit nú til Hëz-ë-kī´-ăh, Svá sigur hin mikli kongurin, kongurin av Assýriu, Hvat troyst *er* hetta, hvará tú troystart?

20 Tú sigurt, (men *tey eru bert* fáfongd orð,) *Eg havi* tilráðing og styrki til kríggið. Nú, á hvønn troystart tú, at tú gert uppreist ímóti mær?

21 Nú, sí, tú troystart uppá stavin av hesum brákaða sevleggi, *enntá* uppá Egyptaland, á hvønn, um ein maður leni, hann vil fara inn í hond hans, og gata hana: soleiðis *er* Pharaoh, Egyptalands kongur, innat øllum sum troysta á hann.

22 Men um tit sigi við meg, Vit troysta á HARRAN Guð váran: *er* ikki tað hann, hvørs høgu pláss og hvørs altør Hëz-ë-kī´-ăh hevur tikið burtur, og hevur sagt til Judah og Jerusalem, Tit skulu tilbiðja frammanfyri hesum altarinum í Jerusalem?

23 Nú tessvegna, eg biði teg, gev pønt til harra míns, kongsins av Assýriu, og eg vil flýggja tær tvey túsund hestar, um tú veri *teg* førur fyri, fyri tín part, at seta reiðmenn uppá teir.

24 Hvussu vilt tú tá venda burtur andlitinum á ēinum høvuðsmanni av teimum minstu av tænarum meistara míns, og seta títt álit á Egyptaland fyri vagnar og fyri hestmenn?

25 Eri eg nú komin upp uttan HARRAN ímóti hesum plássi at oyða tað? HARRIN segði til mín, Far upp ímóti hesum landi, og oyð tað.

26 Tá søgdu Ē´-lī-ă-kīm Hīl´-kī-ăh sonur, og Sjëb´-nă, og Jó´-âh, við Răb´-sjă-kēh, Tala, eg biði teg,

til tænara tína á tí Sýriska málinum; tí at vit skilja *tað:* og tala ikki við okkum á Jødanna máli, í oyruni á fólkinum sum *eru* á múrinum.

27 Men Răb´-sjă-kēh segði við teir, Hevur meistari mín sent meg til meistara tín, og til tín, at tala hesi orð? *hevur hann* ikki *sent meg* til menninar, sum sita á múrinum, at teir mega eta sítt egna skarn, og drekka sítt egna piss við tykkum?

28 Síðan stóð Răb´-sjă-kēh og rópaði við eini harðari rødd á Jødanna máli, og talaði, sigandi, Hoyrið orð hins mikla kongs, kongsins av Assýriu:

29 Svá sigur kongur, Latið ikki Hĕz-ĕ-kī´-ăh villleiða tykkum: tí at hann skal ei vera førur fyri at útfría tykkum út úr hond hansara:

30 Eiheldur latið Hĕz-ĕ-kī´-ăh fáa tykkum at troysta á HARRAN, sigandi, HARRIN vil vissuliga útfría okkum, og hesin staður skal ei verða flýggjaður inn í hondina á konginum av Assýriu.

31 Lurtið ikki eftir Hĕz-ĕ-kī´-ăh: tí at svá sigur kongurin av Assýriu, Gerið *eina semju* við meg viðˆ eini gávu, og komið út til mín, og *síðan* etið tit hvør maður av egna víntræi sínum, og hvør *og* ēin av egna fikutræi sínum, og drekkið tit hvør *og* ēin vøtnini av brunni sínum:

32 Inntil eg komi og taki tykkum burtur til eitt land, líka *sum* tykkara egna land, eitt land av korni og víni, eitt land av breyði og víngørðum, eitt land av olivinolju og av hunangi, at tit mega liva, og ikki doyggja: og lýðið ikki á Hĕz-ĕ-kī´-ăh, tá ið hann yvirtalar tykkum, sigandi, HARRIN vil útfría okkum.

33 Hevur nakar av gudunum hjá tjóðunum útfríað yvirhøvur land sítt út úr hondini á konginum av Assýriu?

34 Hvar *eru* gudarnir hjá Há´măth, og hjá Arpad? hvar *eru* gudarnir hjá Sê-p*h*âr´-vâ-ĭm, Hē´-nă, og Ĭ´-văh? hava teir útfríað Să-mâr´-ĭ-ă út úr hond míni?

35 Hvørjir *eru* teir millum alra guda landanna, sum hava útfríað land sítt út úr hond míni, at HARRIN skuldi útfríað Jerusalem út úr hond míni?

36 Men fólkið helt friði sínum, og svaraði honum ikki eitt orð: tí at áboðið hjá kongi var, sigandi, Svarið honum ikki.

37 Tá komu Ē´-lī-ă-kĭm Hĭl´-kī-ăh sonur, sum *var* yvir húshaldinum, og Sjĕb´-nă — skrivarin, og Jó´-âh Á-s*ă*p*h*-s sonur — skrásetarin, til Hĕz-ĕ-kī´-ăh við klæðum *sínum* skræddum, og søgdu honum orðini hjá Răb´-sjă-kēh.

KAPITUL 19

OG tað bar á, tá ið Hĕz-ĕ-kī´-ăh kongur hoyrdi *tað,* at hann skræddi klæðir síni, og dekkaði seg við sekkjaklæði, og fór inn í hús HARRANS.

2 Og hann sendi Ē´-lī-ă-kĭm, sum *var* yvir húshaldinum, og Sjĕb´-nă skrivara, og teir elstu av prestunum, dekkaðar við sekkjaklæði, til Esaiah proph*e*ts, Amoz sonar.

3 Og teir søgdu við hann, Svá sigur Hĕz-ĕ-kī´-ăh, Hesin dagurin *er* ein dagur av trongd, og av hartan, og Guðsspottan: tí at børnini eru komin til føðingina, og *tað er* ikki styrki til at bera fram.

4 Tað kann vera, *at* HARRIN Guð tín vil hoyra øll orðini hjá Răb´-sjă-kēh, hvønn kongurin av Assýriu, meistari hansara, hevur sent at háða hin livandi Guð; og vil átala orðini sum HARRIN Guð tín hevur hoyrt: hvørsvegna lyft upp *tína* bøn fyri leivdini sum eru eftir.

5 So tænararnir hjá Hĕz-ĕ-kī´-ăh kongi komu til Esaiah.

6 ¶ Og Esaiah segði við teir, Svá skulu tit siga til meistara tykkara, Svá sigur HARRIN, Ver ikki ræddur fyri orðunum sum tú hevurt hoyrt, við hvørjum tænararnir hjá konginum av Assýriu hava Guðsspottað meg.

7 Sí, eg vil senda eitt blak omanyvir hann, og hann skal hoyra eitt graml, og skal venda aftur til egna land sítt; og eg vil volda honum at falla viðˇ svørðinum í sínum egna landi.

8 ¶ So Răb´-sjă-kēh vendi aftur, og fann Assýriu kong kríggjandi ímóti Lĭb´-năh: tí at hann hevði hoyrt, at hann var farin avstað frá Lá´-chĭsj.

9 Og tá ið hann hoyrdi graml um Tĭr-há´-kăh kong av Ē-thĭ-ō´-pĭ-ŭ, Sí, hann er komin út at berjast ímóti tær: sendi hann sendiboðar aftur at Hĕz-ē-kī´-ăh, sigandi,

10 Svá skulu tit tala til Hĕz-ē-kī´-ăh kongs av Judah, sigandi, Lat ikki Guð tín, á hvønn tú troystart, villleiða teg, sigandi, Jerusalem skal ikki verða flýggjað inn í hondina á konginum av Assýriu.

11 Sí, tú hevurt hoyrt hvat kongarnir av Assýriu hava gjørt við øll lond, við at oyða tey fullkomiliga: og skalt tú verða útfríaður?

12 Hava gudarnir hjá tjóðunum útfríað teir sum fedrar mínir hava oytt; *eins og* Gō´-zăn, og Hár´-ăn, og Rē´-zĕph, og børn Edens sum *vóru* í Thĕl´-ă-sâr?

13 Hvar *er* kongurin av Há´-măth, og kongurin av Arpad, og kongurin av staði Sê-phâr´-vâ-ĭm-s, av Hē´-nă, og Ĭ´-văh?

14 ¶ Og Hĕz-ē-kī´-ăh móttók brævið av hendi sendiboðanna, og las tað: og Hĕz-ē-kī´-ăh fór niðan í hús HARRANS, og breiddi tað framfyri HARRAN.

15 Og Hĕz-ē-kī´-ăh bað frammi fyri HARRANUM, og segði, O HARRI Guð Ísraels, sum býrt *ímillum* chêr-û-bĭm´-arnar, tú ert Guðˇ, *enntá* tú einsamallur; hjá øllum kongadømum jarðarinnar; tú hevurt gjørt himin og jørð.

16 HARRI, boygg niður oyra títt, og hoyr: opna, HARRI, eygu tíni, og síggj: og hoyr orðini hjá Sĕn-năch´-ĕr-ĭb, sum hevur sent hann at spotta hin livandi Guð.

17 Av sonnum, HARRI, kongarnir av Assýriu hava oytt tjóðirnar og lond teirra,

18 Og hava kastað teirra gudar inn í eldin: tí at teir *vóru* eingir gudar, men verkið av mannahondum, viður og steinur: tí hava teir oytt teir.

19 Nú tessvegna, O HARRI Guð vár, eg heiti á teg, bjarga tú okkum út úr hond hans, at øll kongadømir jarðarinnar mega vita, at tú *ert* HARRIN Guð, *enntá* tú einans.

20 ¶ Tá sendi Esaiah Amoz sonur til Hĕz-ē-kī´-ăh, sigandi, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, *Tað*, sum tú hevurt biðið til mín ímóti Sĕn-năch´-ĕr-ĭb kongi av Assýriu, havi eg hoyrt.

21 Hetta *er* orðið sum HARRIN hevur talað viðvíkjandi honum; Jomfrúgvin, Zions dóttir, hevur vanvirt teg, *og* lævið teg í háð; Jerusalems dóttir hevur rist høvur sítt at tær.

22 Hvønn hevurt tú háðað og Guðsspottað? og ímóti hvørjum hevurt tú upphevjað rødd *tína*, og lyft upp eygum tínum til hæddar? *enntá* ímóti *Hinum* Heilaga Ísraels.

23 Viðˇ tínum sendiboðum hevurt tú háðað Harran, og hevurt sagt, Við fjøldini av mínum vagnum eri eg komin upp til fjallanna hædd, til Lī´-bă-nŏn-s síður, og vil skera niður hini høgu sedris trø tess, *og* hini úrvals furu trø tess: og eg vil innganga

inn í tilhøldini av landamørkum hans, *og inn í* skóg Carmels hans.

24 Eg havi grivið og drukkið fremmand vøtn, og við ilini á mínum fótum havi eg turkað upp allar áirnar av kringsettum plássum.

25 Hevurt tú ikki hoyrt langt síðani, *hvussu* eg havi gjørt tað, *og* frá fornum tíðum, at eg havi myndað tað? nú havi eg fingið tað at bera á, at tú skuldirt vera til *tess* at leggja *í* oyði *víg*girdar staðir *yvirí* oyðisamar dungar.

26 Tí vórðu teirra íbúgvar av lítlari kraft, teir vórðu mótfalnir og ørkymlaðir; teir vórðu *sum* gras markarinnar, og *sum* hin grøna urt, *sum* grasið á húsatoppunum; og *sum korn,* svidnað áður enn tað veri vaksið upp.

27 Men eg veit bústað tín, og tína faring út, og tína koming inn, og tína øði ímóti mær.

28 Av tí at tín øði ímóti mær og gartarí títt er komið upp inn í oyru míni, tí vil eg seta mín húk í nøs tína, og boygsl mítt í varrar tínar, og eg vil venda tær tilbakar eftir veginum, eftir hvørjum tú komst.

29 Og hetta *skal vera* tær eitt tekin, Tit skulu eta hetta árið slík ting sum vaksa av sær sjálvum, og í øðrum árinum tað sum sprettur av tí sama; og í tí triðja árinum sáa tit, og heysta, og planta víngarðar, og eta fruktirnar harav.

30 Og leivdin, sum hevur komist undan av húsi Judah, skal uppaftur festa rót niðureftir, og bera frukt uppeftir.

31 Tí at út úr Jerusalem skal fara fram ein leivd, og teir sum komast undan úr Zion fjalli: vandlæti HARRA *herliðanna* skal gera hetta.

32 Tessvegna, svá sigur HARRIN viðvíkjandi konginum av Assýriu, Hann skal ikki koma inn í henda stað, ella skjóta eina ørv har, ella koma framfyri hann við skjøldri, ella laða ein *virki*sgarð ímóti honum.

33 Eftir tí veginum sum hann kom, eftir hinum sama skal hann venda aftur, og skal ikki koma inn í henda stað, sigur HARRIN.

34 Tí at eg vil verja henda stað, til at frelsa hann, fyri mína egnu skyld, og fyri skyld tænara míns Dávids.

35 ¶ Og tað bar á ta náttina, at eingil HARRANS fór út, og sló í leirinum hjá Assýriarunum eitt hundrað *og* fýrsinstjúgu og fimm túsund: og tá ið teir reistust árla um morgunin, sí, teir *vóru* allir deyð lík.

36 So Sĕn-năch′-ĕr-ĭb kongur av Assýriu fór avstað, og fór og vendi aftur, og dvaldist í Nĭn′-ē-vēh.

37 Og tað bar á, sum hann tilbað í húsi Nĭs′-rŏch-s, guds síns, at Ă-drăm′-mĕ-lĕch og Sĭă-rē′-zĕr, synir hansara, slógu hann við svørðinum: og teir komust undan inn í land Ar-mē′-nĭ-ŭ. Og Ē-sâr-hăd′-dŏn, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 20

Í TEIMUM døgum varð Hĕz-ē-kī′-ăh sjúkur at deyða. Og propheturin Esaiah, Amoz sonur, kom til hansara, og segði við hann, Svá sigur HARRIN, Set títt hús í rættlag; tí at tú skalt doyggja, og ikki liva.

2 Tá vendi hann andliti sínum til veggin, og bað at HARRANUM, sigandi,

3 Eg bøni teg, O HARRI, minst til nú, hvussu eg havi gingið frammi fyri tær í sannleika og við einum fullkomnum hjarta, og havi gjørt *tað sum er* gott í eygsjón tíni. Og Hĕz-ē-kī′-ăh grætt sáran.

4 Og tað bar á, áður enn Esaiah var farin út í hin mittasta forgarð, at orð HARRANS kom til hansara, sigandi,

5 Vend aftur, og sig Hëz-ë-kī´-ăh, høvuðsmanni fólks míns, Svá sigur HARRIN, Guð Dávids, faðirs tíns, Eg havi hoyrt tína bøn, eg havi sæð tíni tár: sí, eg vil grøða teg: í tí triðja deginum skalt tú fara niðan at húsi HARRANS.

6 Og eg vil leggja afturat tínum døgum fimtan ár; og eg vil útfría teg og henda stað út úr hondini á kongi Assýriu; og eg vil verja henda stað fyri mína egnu skyld, og fyri skyld tænara míns Dávids.

7 Og Esaiah segði, Tak ein klump av fikum. Og teir tóku og løgdu *hann* á svullin, og hann kom aftur fyri seg.

8 ¶ Og Hëz-ë-kī´-ăh segði til Esaiah, Hvat *skal vera* tekinið, at HARRIN vil grøða meg, og at eg skal fara niðan í hús HARRANS hin triðja dagin?

9 Og Esaiah segði, Hetta tekinið skalt tú hava av HARRANUM, at HARRIN vil gera tað ting sum hann hevur talað: skal skuggin fara frameftir tíggju gradur, ella fara aftur tíggju gradur?

10 Og Hëz-ë-kī´-ăh svaraði, Tað er eitt lætt ting hjá skugganum at fara niður tíggju gradur: nei, men lat skuggan venda aftur aftureftir tíggju gradur.

11 Og Esaiah prophetur rópti á HARRAN: og hann førdi skuggan tíggju gradur aftureftir, við hvørjum hann var farin niður í *sól*skivu Áhazar.

12 ¶ Á teirri tíð sendi Bêr´-ô-dăch-băl´-ă-dăn Băl´-ă-dăn-s sonur, Bábylons kongur, brøv og eina gávu at Hëz-ë-kī´-ăh: tí at hann hevði hoyrt, at Hëz-ë-kī´-ăh hevði verið sjúkur.

13 Og Hëz-ë-kī´-ăh gav gætur at teimum, og sýndi teimum alt hús sína dýrabæru luta, silvurið, og gullið, og kryddurtirnar, og hina dýrabæru salvu, og *alt* hús herbúnaðar síns, og alt sum fanst í dýrgripa*goymsl*um hans: tað var einkið í húsi hansara, ella í øllum harradømi hansara, sum Hëz-ë-kī´-ăh sýndi teimum ikki.

14 ¶ Tá kom Esaiah prophetur at Hëz-ë-kī´-ăh kongi, og segði við hann, Hvat søgdu hesir menninir? og hvaðani frá komu teir at tær? Og Hëz-ë-kī´-ăh segði, Teir eru komnir frá einum fjarløgdum landi, *enntá* frá Bábylon.

15 Og hann segði, Hvat hava teir sæð í húsi tínum? Og Hëz-ë-kī´-ăh svaraði, Øll *tingini,* sum *eru* í húsi mínum, hava teir sæð: tað er einkið millum dýrgripir mínar, sum eg ikki havi sýnt teimum.

16 Og Esaiah segði við Hëz-ë-kī´-ăh, Hoyr HARRANS orð.

17 Sí, teir dagar koma, at alt sum *er* í húsi tínum, og tað sum tínir fedrar hava lagt niðurfyri í goymslu at hesum degi, skal verða borið inn í Bábylon: einkið skal verða eftir, sigur HARRIN.

18 Og av sonum tínum, sum skulu útganga frá tær, sum tú skalt gita, skulu teir taka burtur; og teir skulu vera hirðmenn í slottinum hjá kongi Bábylons.

19 Tá segði Hëz-ë-kī´-ăh við Esaiah, Gott *er* orðið hjá HARRANUM, sum tú hevurt talað. Og hann segði, *Er tað* ikki *gott,* um friður og sannleiki verði á døgum mínum?

20 ¶ Og restin av gerningum Hëz-ë-kī´-ăh, og allur máttur hansara, og hvussu hann gjørdi ein hyl, og eina *vatn*leiðing, og førdi vatn inn í staðin, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

21 Og Hëz-ë-kī´-ăh svav hjá fedrum sínum: og Mă-năs´-sēh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 21

MĂ-NĂS´-SĒH *var* tólv ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja, og ríkti fimti og fimm ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Hĕph´-zī-băh.

2 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, eftir andstygdum hinna heidnu, hvørjar HARRIN kastaði út undan Ísraels børnum.

3 Tí hann bygdi upp aftur hini høgu pláss, hvørji Hĕz-ē-kī´-ăh, faðir hansara, hevði oytt; og hann reisti upp altør til Bă´-ăl-s, og gjørdi eina lund, eins og gjørdi Áhab, kongur Ísraels; og tilbað alt herlið himins, og tænti teimum.

4 Og hann bygdi altør í húsi HARRANS, um hvørt HARRIN segði, Í Jerusalem vil eg seta navn mítt.

5 Og hann bygdi altør til alt herlið himins í teimum tveimum forgørðunum av húsi HARRANS.

6 Og hann fekk son sín *at* fara ígjøgnum eldin, og gav ans eftir tíðum, og brúkti rúnagandanir, og fekst við vælkunnugar andar og gandakallar: hann virkaði mikla vondsku í eygsjón HARRANS, til at tirra *hann* til firtnis.

7 Og hann setti eina rista mynd av lundini, sum hann hevði gjørt, í húsið, um hvørt HARRIN segði til Dávids, og til Sálomons, sonar hans, Í hetta hús, og í Jerusalem, sum eg havi valt burtur úr øllum ættargreinum Ísraels, vil eg seta navn mítt um ævir:

8 Eiheldur vil eg fáa føtur Ísraels *at* flyta meira út úr landinum sum eg gav teirra fedrum; einans um teir vilji geva ans eftir at gera samsvarandi við alt sum eg havi áboðið teimum, og samsvarandi við alla lógina sum tænari mín Móses ábjóðaði teimum.

9 Men teir lurtaðu ikki *eftir:* og Mă-năs´-sēh tøldi teir til at gera meira ilt enn gjørdu tjóðirnar, sum HARRIN oyddi undan Ísraels børnum.

10 ¶ Og HARRIN talaði við tænarum sínum, prophetunum, sigandi,

11 Av tí at Mă-năs´-sēh kongur av Judah hevur gjørt hesar andstygdir, *og* hevur gjørt vondligani uppum alt sum Amoritarnir gjørdu, sum *vóru* undan honum, og hevur fingið Judah eisini til at synda við avgudum sínum:

12 Tessvegna, svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Sí, eg føri *slíkt* ilt omanyvir Jerusalem og Judah, at hvørsumhelst *ið* hoyrir um tað, bæði oyru hansara skulu ringja.

13 Og eg vil spenna yvir Jerusalem *máti*bandið av Să-mâr´-ĭ-ŭ, og loddið av húsi Áhabs: og eg vil turka Jerusalem sum ein *maður* turkar eitt fat, turkandi *tað,* og vendandi *tí* upp *og* niður.

14 Og eg vil yvirgeva leivdina av arvi mínum, og flýggja teir inn í hondina á teirra fíggindum; og teir skulu gerast ein bráð og ein fongur fyri øllum fíggindum sínum;

15 Av tí at teir hava gjørt *tað sum* ilt *var* í eygsjón míni, og hava tirrað meg til firtnis, síðan tann dag teirra fedrar komu fram út úr Egyptalandi, alt at hesum degi.

16 Harafturat helti Mă-năs´-sēh sakleyst blóð sera nógv, til hann hevði fylt Jerusalem frá ēinum enda til annan; umframt hansara synd, hvarvið hann fekk Judah at synda, í at gera *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS.

17 ¶ Nú, restin av gerningum Mă-năs´-sēh, og alt sum hann gjørdi, og hansara synd sum hann syndaði, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

18 Og Mă-năs´-sēh svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður í garði egna húss síns, í garði Uz´-zăh: og Ámon, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

19 ¶ Ámon *var* tjúgu og tvey ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti tvey ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Mĕ-sjŭl´-lĕ-mĕth, dóttir Hâr´-ûz-ar úr Jŏt´-băh.

20 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, eins og faðir hansara Mă-năs´-sēh gjørdi.

21 Og hann gekk í øllum veginum sum faðir hansara gekk í, og tænti skurðgudunum sum faðir hansara tænti, og tilbað teir:

22 Og hann yvirgav HARRAN Guð fedra sína, og gekk ikki í vegi HARRANS.

23 ¶ Og tænarar Ámons samansvórust ímóti honum, og vógu kong í egna húsi hans.

24 Og landsins fólk vógu allar teir sum høvdu samansvorist ímóti Ámon kongi; og landsins fólk gjørdi Jó´-sī-ăh, son hansara, *til* kong í hansara stað.

25 Nú, restin av gerningum Ámons sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

26 Og hann varð jarðaður í gravhýsi sínum í garði Ŭz´-zā: og Jó´-sī-ăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 22

JÓ´-SĪ-ĂH *var* átta ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti tríati og ēitt ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Jĕ-dī´-dăh, dóttir Â-dâî´-ăh úr Bŏs´-căth.

2 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, og gekk í øllum vegi Dávids, faðirs síns, og vendi ikki til viks til hinnar høgru handar, ella til hinnar vinstru.

3 ¶ Og tað bar á í tí átjanda árinum hjá Jó´-sī-ăh kongi, *at* kongur sendi Sjá´-p<u>h</u>ăn Âz-ăl´-jăh son Mĕ-sjŭl´-lăm-s sonar, skrivara, til húss HARRANS, sigandi,

4 Far niðan til Hĭl´-kī-ăh høvuðsprests, at hann má samanleggja silvurið sum er ført inn í hús HARRANS, sum durarvørðirnir hava savnað av fólkinum:

5 Og lat teir flýggja tað inn í hondina á gerarunum av arbeðinum, sum hava umsjónina av húsi HARRANS: og lat teir geva tað til gerararnar av arbeðinum, sum *er* í húsi HARRANS, til at umvæla brestirnar av húsinum,

6 Innat træsmiðum, og byggjarum, og múrarum, og til at keypa timbur og høgdan stein til at umvæla húsið.

7 Hvussu enn er, tað varð eingin uppgerð gjørd við teir av peninginum, sum varð flýggjaður inn í hond teirra, av tí at teir handlaðu trúfastliga.

8 ¶ Og Hĭl´-kī-ăh høvuðsprestur segði við Sjá´-p<u>h</u>ăn skrivara, Eg havi funnið bók lógarinnar í húsi HARRANS. Og Hĭl´-kī-ăh gav bókina til Sjá´-p<u>h</u>ăn-s, og hann las hana.

9 Og Sjá´-p<u>h</u>ăn skrivari kom til kongs, og bar kongi orð aftur, og segði, Tínir tænarar hava savnað peningin, sum varð funnin í húsinum, og hava flýggjað hann inn í hondina á teimum ið gera arbeiðið, sum hava umsjónina av húsi HARRANS.

10 Og Sjá´-p<u>h</u>ăn skrivari sýndi kongi, sigandi, Hĭl´-kī-ăh prestur hevur flýggjað mær eina bók. Og Sjá´-p<u>h</u>ăn las hana frammi fyri kongi.

11 Og tað bar á, tá ið kongur hevði hoyrt orðini av bók lógarinnar, at hann skræddi klæðir síni.

12 Og kongur skipaði Hĭl´-kī-ăh presti, og Á´-hī-kăm Sjá´-p<u>h</u>ăn-s syni, og Ăc<u>h</u>´-bŏr-i Mī-c<u>h</u>âî´-ăh syni, og Sjá´-p<u>h</u>ăn skrivara, og Ás-ă-hī´-ăh — einum tænara hjá kongi, sigandi,

13 Farið tit, fregnið av HARRANUM fyri meg, og fyri fólkið, og

fyri allan Judah, viðvíkjandi orðunum av hesi bók sum er funnin: tí at mikil *er* vreiði HARRANS, sum er kynd ímóti okkum, av tí at okkara fedrar hava ei givið gætur at orðunum av hesi bók, at gera samsvarandi øllum sum stendur skrivað viðvíkjandi okkum.

14 So Hīl´-kī-āh prestur, og Á-hī-kăm, og Ăch´-bŏr, og Sjá´-phăn, og Ás-ā-hī´-āh, fóru at Hulduh, prophetinnuni, konu Själ´-lŭm-s Tĭk´-văh sonar, Hâr´-hās sonar, vørðinum av klædnagoymsluni; (nú, hon dvaldist í Jerusalem, í studentagarðinum;) og teir samtalaðu við hana.

15 ¶ Og hon segði við teir, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Sigið manninum sum sendi tykkum til mín,

16 Svá sigur HARRIN, Sí, eg vil føra ilt omanyvir hetta plass, og omanyvir íbúgvar tess, *enntá* øll orðini av bókini sum kongurin av Judah hevur lisið:

17 Av tí at teir hava yvirgivið meg, og hava brent roykilsi at øðrum gudum, at teir máttu tirra meg til firtnis við øllum verkum handa sína; tí skal mín vreiði verða kynd ímóti hesum plássi, og skal ei verða sløkt.

18 Men til kongsins av Judah, sum sendi tykkum at fregna av HARRANUM, svá skulu tit siga til hansara, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, *Hvat viðvíkur* orðunum sum tú hevurt hoyrt;

19 Av tí at títt hjarta var eymt, og tú hevurt eyðmýkt teg sjálvan frammi fyri HARRANUM, tá ið tú hoyrdirt hvat eg talaði ímóti hesum plássi, og ímóti íbúgvum tess, at teir skuldu verða ein oyðing og ein banning, og hevurt skrætt tíni klæðir, og grátið frammi fyri mær; eg eisini havi hoyrt *teg,* sigur HARRIN.

20 Sí tessvegna, eg vil savna teg at fedrum tínum, og tú skalt verða savnaður inn í grøv tína í friði; og tíni eygu skulu ei síggja alt tað illa sum eg vil føra uppá hetta pláss. Og teir bóru kongi orð aftur.

KAPITUL 23

OG kongur sendi, og teir savnaðu at honum allar teir elstu av Judah og av Jerusalem.

2 Og kongur fór niðan í hús HARRANS, og allir menninir av Judah og allir íbúgvarnir av Jerusalem við honum, og prestarnir, og prophetarnir, og alt fólkið, bæði smá og stór: og hann las í teirra oyru øll orðini av bók sáttmálans, sum varð funnin í húsi HARRANS.

3 ¶ Og kongur stóð hjá eini súlu, og gjørdi ein sáttmála frammi fyri HARRANUM, at ganga eftir HARRANUM, og at halda boðini hjá honum og hansara vitnisburðir og hans ásetingar við øllum hjarta *sínum* og allari sál *síni,* at útinna orðini av hesum sáttmála, sum skrivað stóðu í hesi bók. Og alt fólkið stóð við sáttmálan.

4 Og kongur skipaði Hīl´-kī-āh høvuðspresti, og prestunum av øðrum skiftinum, og durarvørðunum, at føra fram út úr templi HARRANS øll reiðini sum vóru gjørd til Bā´-ăl, og til lundina, og til alt herlið himins: og hann brendi tey uttanfyri Jerusalem í akrum Kī´-drŏn-s, og bar øskurnar av teimum at Beth-el.

5 Og hann setti frá hinar avgudasomu prestar, hvørjar kongarnir av Judah høvdu innsett at brenna roykilsi í teimum høgu plássunum í staðunum av Judah, og í plássunum runt umkring Jerusalem; teir eisini sum brendu roykilsi at Bā´-ăl-i, til sólarinnar, og til mánans, og til gongustjarnanna, og til als herliðs himins.

6 Og hann førdi út lundar*stólpan* frá húsi HARRANS, útum Jeru-

salem, at áarløkinum Kī´-drōn, og brendi hann við áarløkin Kī´-drōn, og muldi *hann* smáan til støv, og kastaði støvið harav uppá gravir fólksins barna.

7 Og hann breyt niður húsini hjá sodomitunum, sum *vóru* við hús HARRANS, har kvinnurnar vevaðu tjaldváðir til lundina.

8 Og hann førdi allar prestarnar út úr staðunum av Judah, og dálkaði tey høgu plássini, har prestarnir høvdu brent roykilsi, frá Gebu til Bēēr´-sjě-bŭ, og breyt niður hini høgu pláss portranna, sum *vóru* í faringini inn av portri Josjua, stjórnara staðarins, sum *vóru* við vinstru hondina hjá manni við staðarportrið.

9 Hóast hetta, prestarnir av teimum høgu plássunum komu ikki niðan til altar HARRANS í Jerusalem, men teir ótu av tí ósúrgaða breyðinum millum brøður sínar.

10 Og hann dálkaði Tŏ´-phěth, sum *er* í dali Hĭn´-nŏm-s barna, at eingin maður mátti fáa son sín ella dóttur sína at fara ígjøgnum eldin til Molech-s.

11 Og hann tók burtur hestarnar, sum kongarnir av Judah høvdu givið til sólarinnar, við inngongd HARRANS húss, við kamarið hjá Ná´-thăn-mē´-lĕch-i kamarsharra, sum *var* í útjaðarunum, og brendi vagnar sólarinnar við eldi.

12 Og altarini sum *vóru* á toppinum av tí ovara kamarinum hjá Áhaz-i, sum kongarnir av Judah høvdu gjørt, og altarini sum Mă-năs´-sēh hevði gjørt í teimum tveimum forgørðunum av húsi HARRANS, bardi kongur niður, og breyt *tey* niður haðani frá, og kastaði dustið av teimum inn í áarløkin Kī´-drōn.

13 Og tey høgu plássini sum *vóru* frammanfyri Jerusalem, sum *vóru* til høgru handar spillingarfjallsins, sum Sálomon, kongur Ísraels, hevði bygt til Ăsj´-tō-rĕth – andstygd Zî-dō´-nī-aranna, og til Chē´-mōsj – andstygd Móabitanna, og til Mĭl´-cōm – andstygd Ammons barna, dálkaði kongur.

14 Og hann breyt í stykkir myndirnar, og skar niður lundirnar, og fylti teirra pláss˘ við mannabeinum.

15 ¶ Harafturat altarið sum *var* í Beth-el, *og* tað høga plássið sum Jĕr-ó´-bô-ăm Nĕ´-băt-s sonur, sum fekk Ísrael at synda, hevði gjørt, bæði hatta altarið og tað høga plássið breyt hann niður, og brendi tað høga plássið, *og* muldi *tað* smátt til støv, og brendi lundina.

16 Og sum Jó´-sī-ăh vendi sær, bar hann eyga við gravhýsini sum *vóru* har í fjallinum, og sendi, og tók beinini út úr gravhýsunum, og brendi *tey* uppiá altarinum, og dálkaði tað, samsvarandi við HARRANS orð sum Guðs maður in kunngjørdi, sum kunngjørdi hesi orðini.

17 Síðan segði hann, Hvør tittul *er* hasin, sum eg síggi? Og staðarmenninir søgdu honum, *Tað er* gravhýsi Guðs mansins, sum kom frá Judah, og kunngjørdi hesi tingini sum tú hevurt gjørt ímóti altari Beth-el-s.

18 Og hann segði, Latið hann vera; lat ongan mann flyta beinini hjá honum. So teir lótu beinini hjá honum vera, við beinunum hjá prophetinum sum kom út úr Să-mâr´-ī-ŭ.

19 Og øll húsini eisini av teimum høgu plássunum sum *vóru* í staðunum av Să-mâr´-ī-ŭ, hvørji kongarnir av Ísrael høvdu gjørt til at upptirra *HARRAN* til firtnis, tók Jó´-sī-ăh burtur, og gjørdi við tey samsvarandi við allar teir gerningar sum hann hevði gjørt í Beth-el.

20 Og hann vó allar prestarnar av teimum høgu plássunum, sum

vóru har uppiá altarunum, og brendi beinini av monnum uppiá teimum, og vendi aftur til Jerusalem.

21 ¶ Og kongurin skipaði øllum fólkinum, sigandi, Haldið umleypið at HARRANUM Guði tykkara, eins og skrivað *stendur* í bókini av hesum sáttmála.

22 Vissuliga varð tað ikki hildið slíkt umleyp frá døgum dómaranna, sum dømdu Ísrael, ella í øllum døgum Ísraels konga, ella Judah konga;

23 Uttan í tí átjanda árinum hjá Jó-sī-ăh kongi, *í hvørjum* hetta umleyp varð hildið fyri HARRANUM í Jerusalem.

24 ¶ Harafturat *virkararnar við* vælkunnugum andum, og gandakallarnar, og myndirnar, og skurðgudarnar, og allar andstygdirnar sum vórðu fingnar eyga á í Judah landi og í Jerusalem, koyrdi Jó-sī-ăh burtur, at hann mátti útinna orðini av lógini, sum stóðu skrivaði í bókini sum Hĭl-kī-ăh prestur fann í húsi HARRANS.

25 Og líkur honum var eingin kongur undan honum, sum vendi til HARRANS við øllum hjarta sínum, og við allari sál síni, og við øllum mátti sínum, samsvarandi við alla lóg Mósesar; eiheldur eftir hann reistist *nakar* líka *sum* hann.

26 ¶ Hóast hetta, HARRIN vendi ikki frá grimmleikanum av síni miklu vreiði, hvarvið hansara firtni varð kynd ímóti Judah, uppá grund av øllum tirringunum sum Mă-năs-sēh hevði tirrað hann við.

27 Og HARRIN segði, Eg vil burtflyta Judah eisini út úr eygsjón míni, eins og eg havi burtflutt Ísrael, og vil kasta av henda stað, Jerusalem, sum eg havi valt, og húsið, um hvørt eg segði, Mítt navn skal vera har.

28 Nú, restin av gerningum Jó-sī-ăh, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

29 ¶ Á hansara døgum fór Phâr-ă-ōh-nē-chŏh, Egyptalands kongur, upp ímóti konginum av Assýriu til ánna Ēv-phrā-tēs: og Jó-sī-ăh kongur fór ímóti honum; og hann sló hann við Mĕ-gĭd-dō, tá ið hann hevði sæð hann.

30 Og hansara tænarar bóru hann í einum vagni deyðan frá Mĕ-gĭd-dō, og førdu hann til Jerusalem, og jarðaðu hann í hansara egna gravhýsi. Og landsins fólk tók Jĕ-hó-ă-hăz Jó-sī-ăh son, og salvaðu hann, og gjørdu hann *til* kong í stað faðirs hansara.

31 ¶ Jĕ-hó-ă-hăz *var* tjúgu og trý ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja; og hann ríkti tríggjar mánaðir í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Há-mū-tăl, dóttir Jeremiah úr Lĭb-năh.

32 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, samsvarandi við alt sum hansara fedrar høvdu gjørt.

33 Og Phâr-ă-ōh-nē-chŏh setti hann í bond við Rĭp-lăh í landi Há-măth-s, at hann ei mátti ríkja í Jerusalem; og setti landið til eitt íkast á eitt hundrað talentir av silvuri, og eina talent av gulli.

34 Og Phâr-ă-ōh-nē-chŏh gjørdi Ē-lī-ă-kĭm Jó-sī-ăh son *til* kong í rúm Jó-sī-ăh, faðirs hansara, og snúði navni hansara til Jĕ-hŏī-ă-kĭm, og tók Jĕ-hó-ă-hăz burtur: og hann kom til Egyptalands, og doyði har.

35 Og Jĕ-hŏī-ă-kĭm gav silvurið og gullið til Pharaohs; men hann skattaði landið til at geva peningin samsvarandi við áboðið hjá Pharaoh: hann kravdi silvurið og gullið av fólki landsins, av hvørjum *og* ēinum samsvarandi við skatting hans, at geva *tað* at Phâr-ă-ōh-nē-chŏh.

36 ¶ Jĕ-hŏī-ă-kĭm *var* tjúgu og fimm ára gamalur, tá ið hann

byrjaði at ríkja; og hann ríkti ellivu ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Zĕ-bū´-dăh, dóttir Pĕ-dā´-ăh úr Rū´-măh.

37 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, samsvarandi við alt sum hansara fedrar høvdu gjørt.

KAPITUL 24

Á HANSARA døgum kom Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur av Bábylon upp, og Jĕ-hoī´-ă-kīm gjørdist tænari hansara trý ár: tá vendi hann og gjørdi uppreist ímóti honum.

2 Og HARRIN sendi ímóti honum flokkar av Chăl-dē´-arunum, og flokkar av Sýriulendingunum, og flokkar av Móabitunum, og flokkar av Ammons børnum, og sendi teir ímóti Judah at oyða tað, samsvarandi við HARRANS orð, sum hann talaði við tænarum sínum prophetunum.

3 Vissuliga, við áboð HARRANS kom *hetta* uppá Judah, at burtflyta *teir* út úr eygsjón síni, fyri syndirnar hjá Mă-năs´-sēh, samsvarandi við alt sum hann gjørdi;

4 Og eisini fyri tað sakleysa blóðið, sum hann úthelti: tí at hann fylti Jerusalem við sakleysum blóði; sum HARRIN vildi ikki náða.

5 ¶ Nú, restin av gerningum Jĕ-hoī´-ă-kīm-s, og alt sum hann gjørdi, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna Judah konga?

6 So Jĕ-hoī´-ă-kīm svav hjá fedrum sínum: og Jĕ-hoī´-ă-chĭn, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

7 Og kongurin av Egyptalandi kom ikki aftur meira út úr landi sínum: tí at kongurin av Bábylon hevði tikið frá Egyptalands ánni at ánni Ēv-phrā´-tēs alt sum hoyrdi til Egyptalands kongs.

8 ¶ Jĕ-hoī´-ă-chĭn *var* átjan ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti í Jerusalem tríggjar mánaðir. Og navn móður hansara *var* Nĕ-hŭsj´-tă, dóttir Ĕl´-nâ-thăn-s úr Jerusalem.

9 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, samsvarandi við alt sum faðir hansara hevði gjørt.

10 ¶ Á teirri tíð komu tænarar Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr-s kongs av Bábylon upp ímóti Jerusalem, og staðurin varð kringsettur.

11 Og Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur av Bábylon kom ímóti staðinum, og hansara tænarar kringsettu hann.

12 Og Jĕ-hoī´-ă-chĭn, kongur Judah, fór út til Bábylons kongs, hann, og móðir hansara, og tænarar hansara, og prinsar hansara, og yvirmenn hansara: og Bábylons kongur tók hann í tí áttanda árinum av ríkjan hansara.

13 Og hann bar út haðani allar dýrgripir HARRANS húss, og dýrgripir kongshússins, og skar í stykkir øll reiðini av gulli, sum Sálomon kongur av Ísrael hevði gjørt í templi HARRANS, eins og HARRIN hevði sagt.

14 Og hann førdi burtur alt Jerusalem, og allar prinsarnar, og allar hinar mektigu reystsemis menn, *enntá* tíggju túsund fangar, og allar handverkararnar og smiðir*nar:* eingin varð verandi, uttan tað fátækasta slagið av fólki landsins.

15 Og hann førdi burtur Jĕ-hoī´-ă-chĭn til Bábylon, og móður kongsins, og ektakonur kongsins, og yvirmenn hans, og hinar mektigu landsins, *teir* bar hann inn í fangaskap frá Jerusalem til Bábylon.

16 Og allar megnar menninar, *enntá* sjey túsund, og handverkarar og smiðir eitt túsund, allar *sum vóru* sterkir *og* egnaðir til kríggj, enntá teir førdi kongurin av Bábylon *til* fanga til Bábylon.

17 ¶ Og kongurin av Bábylon

gjørdi Măt-tă-nī´-ăh, bróður faðirs hansara, *til* kong í hansara stað, og broytti navn hansara til Zĕd-ĕ-kī´-ăh.

18 Zĕd-ĕ-kī´-ăh *var* tjúgu og ēitt ára gamalur, tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti ellivu ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Há´-mŭ-tăl, dóttir Jeremiah úr Lĭb´-năh.

19 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, samsvarandi við alt sum Jĕ-hŏī´-ă-kīm hevði gjørt.

20 Tí gjøgnum firtni HARRANS bar tað á í Jerusalem og Judah, inntil hann hevði kastað teir út frá nærveru síni, at Zĕd-ĕ-kī´-ăh gjørdi uppreist ímóti kongi Bábylons.

KAPITUL 25

OG tað bar á í tí níggjunda árinum av ríkjan hansara, í tí tíggjunda mánaðinum, á hinum tíggjunda *degi* mánaðarins, *at* Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur av Bábylon kom, hann, og alt herlið hansara, ímóti Jerusalem, og sló upp ímóti tí; og teir bygdu festningar ímóti tí runt umkring.

2 Og staðurin varð kringsettur at hinum ellivta ári Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongs.

3 Og á tí níggjunda *deginum* av tí *fjórða* mánaðinum hevði hungursneyðin yvirvág í staðinum, og har var einkið breyð til fólk landsins.

4 ¶ Og staðurin varð brotin upp, og allir krígsmenninir *flýddu* um nátt*ina* eftir porturs-veginum ímillum tveir múrar, sum *er* við kongsgarðin: (nú, Chăl-dē´-arnir *vóru* ímóti staðinum runt umkring:) og *kongurin* fór vegin ímóti slættanum.

5 Og herurin hjá Chăl-dē´-arunum elti eftir kongi, og innheintaðu hann á slættum Jerichos: og allur herur hansara vórðu spjaddir frá honum.

6 So teir tóku kong, og førdu hann niðan til kongsins av Bábylon til Rĭb´-lăh; og teir góvu dóm uppá hann.

7 Og teir vógu synir Zĕd-ĕ-kī´-ăh frammi fyri eygum hansara, og koyrdu út eyguni á Zĕd-ĕ-kī´-ăh, og bundu hann við fjøtrum av messing, og bóru hann til Bábylon.

8 ¶ Og í tí fimta mánaðinum, á hinum sjeynda *degi* mánaðarins, sum *er* hitt nítjanda ár Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr-s kongs, Bábylons kongs, kom Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaður av lívverjuni, ein tænari hjá kongi Bábylons, at Jerusalem:

9 Og hann brendi hús HARRANS, og kongshúsið, og øll hús Jerusalems, og húsið hjá hvørjum miklum *manni* brendi hann við eldi.

10 Og allur herur Chăl-dē´-aranna, sum *vóru við* høvuðsmanni lívverjunnar, brutu niður múrar Jerusalems runt umkring.

11 Nú, restin av fólkinum *sum vóru* eftir í staðinum, og flóttafólkini sum fullu burtur til Bábylons kongs, við leivdini av fjøldini, bar Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, burtur.

12 Men høvuðsmaðurin av lívverjuni eftirlæt av teimum fátøku landsins *til at vera* víngarðsmenn og bøndur.

13 Og súlurnar av messing sum *vóru* í húsi HARRANS, og undirstøðurnar, og messing sjógvurin sum *var* í húsi HARRANS, brutu Chăl-dē´-arnir í stykkir, og bóru messingin av teimum til Bábylon.

14 Og grýturnar, og skuplurnar, og ljósasaksarnar, og sleivirnar, og øll reiðini av messing, við hvørjum teir tæntu, tóku teir burtur.

15 Og eldpannurnar, og skálirnar, *og* slíkir lutir sum *vóru* av gulli, *í* gulli, og av silvuri, *í* silvuri, tók høvuðsmaðurin av lívverjuni burtur.

16 Tær tvær súlurnar, ein sjógv, og undirstøðurnar sum Sálomon hevði gjørt til húss HARRANS; messingurin av øllum hesum reiðunum var uttan vekt.

17 Hæddin á tí einu súluni *var* átjan alnir, og súluhøvdið uppiá henni *var* messing: og hæddin á súluhøvdinum tríggjar alnir; og tað snúraða verkið, og granateplini uppiá súluhøvdinum runt umkring, alt av messing: og líkt hesum hevði hin onnur súlan við snúraðum verki.

18 ¶ Og høvuðsmaðurin av lívverjuni tók Sĕ-raĭ´-ăh hin fremsta prest, og Zê-phăn´-jăh hin annan prest, og teir tríggjar durarvørðirnar:

19 Og úr staðinum tók hann ein yvirmann sum var settur yvir krígsmonnunum, og fimm menn av teimum sum vóru í nærveru kongsins, sum vórðu funnir í staðinum, og hin fremsta skrivara herliðsins, sum mynstraði fólk landsins, og trísinstjúgu menn av fólki landsins *sum vórðu* funnir í staðinum:

20 Og Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaður lívverjunnar, tók hesar, og førdi teir til Bábylons kongs til Rĭb´-lăh:

21 Og Bábylons kongur sló teir, og vó teir í Rĭb´-lăh í landi Há´-măth-s. So Judah varð borið burt út úr landi teirra.

22 ¶ Og *hvat viðvíkur* fólkinum, sum vórðu verandi í landi Judah, hvørjar Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur av Bábylon hevði eftirlatið, enntá yvir teimum gjørdi hann Gĕ-dăl´-jăh Á´-hĭ-kăm-s son, Sjáphăn-s son, *til* stjórnara.

23 Og tá ið allir høvuðsmenninir av herunum, teir og teirra menn, hoyrdu, at kongurin av Bábylon hevði gjørt Gĕ-dăl´-jăh *til* landsstjóra, komu tað til Gĕdăl´-jăh til Mizpah, enntá Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur, og Jó´-hânăn Că-rē´-ăh sonur, og Sĕ-raĭ´-ăh Tăn-hŭ´-mĕth-s sonur Nē-tôphâ-thīt´-i, og Já-ă-zăn´-jăh — sonur ein Má-ăch-â-thīt´-a, teir og teirra menn.

24 Og Gĕ-dăl´-jăh svór til teirra, og til menn teirra, og segði við teir, Óttist ikki at vera tænarar Chăldē´-aranna: dvøljist í landinum, og tænið kongi Bábylons; og tað skal vera væl *statt* við tykkum.

25 Men tað bar á í tí sjeynda mánaðinum, at Ísj´-mâ-ĕl Nĕthăn´-jăh sonur Ê-lî-sjá´-mă sonar, av hinum kongliga sáði, kom, og tíggju menn við honum, og slógu Gĕ-dăl´-jăh, at hann doyði, og Jødarnar og Chăl-dē´-arnar, sum vóru hjá honum í Mizpah.

26 Og alt fólkið, bæði smáir og miklir, og høvuðsmenninir av herunum, reistust, og komu til Egyptalands: tí at teir vóru ræddir fyri Chăl-dē´-arunum.

27 ¶ Og tað bar á í tí sjey og tríatiunda árinum av fangaskapi Jĕ-hōĭ´-ă-chĭn-s kongs av Judah, í tí tólvta mánaðinum, á hinum sjey og tjúgunda *degi* mánaðarins, *at* Ĕ´-vĭl-mĕr´-ō-dăch, kongur av Bábylon, í tí árinum sum hann byrjaði at ríkja, lyfti upp høvur Jĕhōĭ´-ă-chĭn-s kongs av Judah út úr fongsli;

28 Og hann talaði blídliga til hansara, og setti hansara hásæti uppum hásætið hjá kongunum sum *vóru* við honum í Bábylon;

29 Og skifti hansara fongsuls klæðir: og hann át breyð áframhaldandi frammi fyri honum allar dagarnar av lívi sínum.

30 Og hansara tillutan *var* ein áframhaldandi tillutan, givin honum frá kongi, ein dagligur skamtur til hvønn dag, allar dagarnar av lívi hansara.

HIN FYRRA BÓK
KRÝNIKANNA.

KAPITUL 1

ADAM, Sjeth, Ē´-nŏsj,
2 Kē´-năn, Mă-hál´-ă-lēēl, Jĕ´-rĕd,
3 Hē´-nŏch, Mĕ-thū´-sĕ-lăh, Lá´-mĕch,
4 Nóah, Sjem, Ham, og Já´-phĕth.
5 ¶ Synirnir hjá Já´-phĕth-i; Gō´-mĕr, og Má´-gŏg, og Má´-dâi, og Já´-văn, og Tū´-băl, og Mē´-sjĕch, og Tī´-rās.
6 Og synirnir hjá Gō´-mĕr-i; Ăsj´-chĕ-năz, og Rī´-phăth, og Tō-găr´-măh.
7 Og synirnir hjá Já´-văn-i; Ê-lī´-sjăh, og Tarsjisj, Kittim, og Dō´-dă-nīm.
8 ¶ Synirnir hjá Ham-i; Cŭsj, og Mīz´-râ-īm, Pŭt, og Cānaan.
9 Og synirnir hjá Cŭsj-i; Sē´-bă, og Há´-vī-lăh, og Săb´-tă, og Rā´-ă-mâh, og Săb´-tē-chă. Og synirnir hjá Rā´-ă-mâh; Sjē´-bă, og Dē´-dăn.
10 Og Cŭsj gat Nimrod: hann byrjaði at verða mektigur uppiá jørðini.
11 Og Mīz´-râ-īm gat Lū´-dīm, og Án´-ă-mīm, og Lē-há´-bīm, og Năph´-tū-hīm,
12 Og Păth´-rū-sīm, og Căs´-lū-hīm, (av hvørjum komu Philistarnir,) og Căph´-thō-rīm.
13 Og Cānaan gat Zī´-dōn sín fyrstafødda, og Heth,
14 Jĕb-ū-sīt´-an eisini, og Amoritan, og Gīr-gă-sjīt´-an,
15 Og Hī-vīt´-an, og Ăr-kīt´-an, og Sī-nīt´-an,
16 Og Ăr-vă-dīt´-an, og Zĕm-ă-rīt´-an, og Há-măth-īt´-an.
17 ¶ Synirnir hjá Sjem-i; Ē´-lăm, og Ássj´-ūr, og Ăr-phăx´-ăd, og Lŭd, og Ár´-ăm, og Ūz, og Hŭl, og Gē´-thĕr, og Mē´-sjĕch.
18 Og Ăr-phăx´-ăd gat Sjē´-lâh, og Sjē´-lâh gat Ē´-bĕr.
19 Og Ē´-bĕr-i vórðu føddir tveir synir: navnið hjá tí ēina *var* Pē´-lĕg; av tí at á hansara døgum varð jørðin sundurskift: og navnið hjá bróður hansara *var* Jōk´-tăn.
20 Og Jōk´-tăn gat Ăl´-mō-dăd, og Sjē´-lĕph, og Hā-zâr-má´-vĕth, og Jē´-răh,
21 Há´-dōr-ăm eisini, og Ū´-zăl, og Dīk´-lâh,
22 Og Ē´-băl, og Ă-bīm´-â-ĕl, og Sjē´-bă,
23 Og Ō´-phīr, og Há´-vī-lăh, og Jó´-băb. Allir hesir *vóru* synirnir hjá Jōk´-tăn-i.
24 ¶ Sjem, Ăr-phăx´-ăd, Sjē´-lâh,
25 Ē´-bĕr, Pē´-lĕg, Rē´-ū,
26 Sē´-rūg, Náhor, Tē´-râh,
27 Ábram; tann sami *er* Ábraham.
28 Synirnir hjá Ábrahami; Ísaak*ur*, og Ísj´-mâ-ĕl.
29 ¶ Hetta *eru* ættir teirra: Hin fyrstiføddi hjá Ísj´-mâ-ĕl-i, Nē´-bâi-ōth; síðan Kē´-dăr, og Ăd´-bēēl, og Mīb´-săm,
30 Mīsj´-mă, og Dū´-mâh, Măs´-să, Há´-dăd, og Tē´-mă,
31 Jē´-tūr, Ná´-phīsj, og Kē´-dē-mâh. Hetta eru synirnir hjá Ísj´-mâ-ĕl-i.
32 ¶ Nú, synirnir hjá Kē-tū´-rūh, medkonu Ábrahams: hon føddi Zimran, og Jōk´-sjăn, og Mē´-dăn, og Mī´-dī-ăn, og Īsj´-băk, og Sjū´-âh. Og synirnir hjá Jōk´-sjăn-i; Sjē´-bă, og Dē´-dăn.
33 Og synirnir hjá Mī´-dī-ăn-i; Ē´-phâh, og Ē´-phĕr, og Hē´-nŏch, og Ā´-bī-dă, og Ēl´-dâ-âh. Allir hesir *eru* synirnir hjá Kē-tū´-rūh.
34 Og Ábraham gat Ísaak. Synirnir hjá Ísaaki; Esav og Ísrael.
35 ¶ Synirnir hjá Esav-i; Ē´-lī-phăz, Reū´-ĕl, og Jē´-ūsj, og Já´-ă-lăm, og Kōr´-ăh.
36 Synirnir hjá Ē´-lī-phăz-i; Tē-

măn, og Ómar, Zĕ´-phī, og Gá´-tăm, Kĕ´-năz, og Tĭm´-nā, og Ā´-mâ-lĕk.

37 Synirnir hjá Reû´-ĕl-i; Náhath, Zĕ´-râh, Sjăm´-măh, og Mĭz´-zâh.

38 Og synirnir hjá Sĕ´-ĭr-i; Lō´-tăn, og Sjō´-băl, og Zĭ´-bĕ-ōn, og Á´-nâh, og Dĭ´-sjŏn, og Ē´-zĕr, og Dĭ´-sjăn.

39 Og synirnir hjá Lō´-tăn-i; Hó´-rī, og Hó´-măm: og Tĭm´-nā *var* systir Lō´-tăn-s.

40 Synirnir hjá Sjō´-băl-i; Ăl´-ĭ-ăn, og Mă´n-ă-hăth, og Ē´-băl, Sjĕ´-phī, og Ō´-năm. Og Synirnir hjá Zĭ´-bĕ-ōn-i; Aï´-ăh, og Á´-nâh.

41 Synirnir hjá Á´-nâh; Dĭ´-sjŏn. Og synirnir hjá Dĭ´-sjŏn-i; Amram, og Ĕsj´-băn, og Ĭth´-răn, og Chĕ´-răn.

42 Synirnir hjá Ē´-zĕr-i; Bilhan, og Zā´-văn, *og* Jákan. Synirnir hjá Dĭ´-sjăn-i; Ûz, og Ár´-ăn.

43 ¶ Nú, hesir *eru* kongarnir sum ríktu í landi Ē´-dóm-s, áður enn *nakar* kongur ríkti yvir børnum Ísraels; Bĕ´-lă Bĕ´-ŏr-s sonur: og navnið á staði hansara *var* Dĭn´-hă-bâh.

44 Og tá ið Bĕ´-lă var deyður, ríkti Jó´-băb, sonur Zĕ´-râh úr Bŏz´-răh, í hansara stað.

45 Og tá ið Jó´-băb var deyður, ríkti Hŭ´-sjăm úr landi Tê-măn-ĭt´-anna í hansara stað.

46 Og tá ið Hŭ´-sjăm var deyður, ríkti Há´-dăd Bĕ´-dăd-s sonur, sum sló Mĭ´-dī-ăn í akri Móabs, í hansara stað: og navnið á staði hansara *var* Á´-vĭth.

47 Og tá ið Há´-dăd var deyður, ríkti Săm´-lăh úr Măs-rĕ´-kăh í hansara stað.

48 Og tá ið Săm´-lăh var deyður, ríkti Sjā´-ŭl úr Rē´-hō-bōth við ánna í hansara stað.

49 Og tá ið Sjā´-ŭl var deyður, ríkti Bā´-ăl-há´-năn Ach´-bŏr-s sonur í hansara stað.

50 Og tá ið Bā´-ăl-há´-năn var deyður, ríkti Há´-dăd í hansara stað: og navnið á staði hansara *var* Pā´-ĭ; og navnið hjá ektakonu hansara *var* Mĕ-hĕt´-ă-bĕl Má´-trĕd-s dóttir Mĕ´-zā-hăb-s dóttur.

51 ¶ Há´-dăd doyði eisini. Og hertogar Ē´-dóm-s vóru; Tĭm´-năh hertogi, Ăl´-ĭ-ăh hertogi, Jĕ´-thĕth hertogi,

52 Ă-hól-ĭ-bá´-măh hertogi, Ē´-lăh hertogi, Pĭ´-nōn hertogi,

53 Kĕ´-năz hertogi, Tē´-măn hertogi, Mĭb´-zâr hertogi,

54 Măg´-dĭ-ĕl hertogi, Ĭ´-răm hertogi. Hesir *eru* hertogar Ē´-dóm-s.

KAPITUL 2

HESIR *eru* synir Ísraels; Reûben, Símeon, Levĭ, og Judah, Ĭs´-să-chār, og Zĕ´-bŭ-lŏn,

2 Dán, Jóseph, og Benjamin, Năph´-tâ-lī, Gád, og Ásjer.

3 ¶ Synirnir hjá Judah; Êr, og Ó´-năn, og Sjē´-lâh: *hvørjir* tríggir vórðu føddir honum av dóttur Sjū´-ă, Cānaanitinnuni. Og Êr, hin fyrstiføddi Judah, var óndur í eygsjón HARRANS; og hann vó hann.

4 Og Tá´-mâr, verdóttir hansara, føddi honum Phâr´-ĕz og Zĕ´-râh. Allir synir Judah *vóru* fimm.

5 Synirnir hjá Phâr´-ĕz-i; Hĕz´-rŏn, og Hám´-ūl.

6 Og synirnir hjá Zĕ´-râh; Zimrī, og Ē´-thăn, og Hē´-măn, og Căl´-cŏl, og Dâr´-ă: fimm av teimum í alt.

7 Og synirnir hjá Câr´-mī; Á´-chār, órógvari Ísraels, hvør misbreytst í tí bannaða tinginum.

8 Og synirnir hjá Ē´-thăn-i; Â-zăr´-jăh.

9 Og synirnir eisini hjá Hĕz´-rŏn-i, sum vórðu føddir honum; Jê-ráh´-mĕel, og Rám, og Chĕ´-lū-baî.

10 Og Rám gat Ăm-mĭn´-ă-dăb; og Ăm-mĭn´-ă-dăb gat Náh´-sjŏn, prins Judah barna;

11 Og Náh´-sjŏn gat Săl´-mă, og
Săl´-mă gat Bó´-ăz,
12 Og Bó´-ăz gat Ō´-bĕd, og Ō´-
bĕd gat Ísai,
13 ¶ Og Ísai gat sín fyrstafödda
Ē´-lī-ăb, og Ă-bīn´-ă-dăb hin annan,
og Sjĭm´-mă hin triðja,
14 Nĕth-á´-nēel hin fjórða, Răd´-
dâ-ī hin fimta,
15 Ō´-zĕm hin sætta, Dávid hin
sjeynda:
16 Hvørs systrar *vóru* Zĕr-ū´-
jăh, og Ă´-bĭ-gaîl. Og synirnir hjá
Zĕr-ū´-jŭh; Á´-bĭ-sjaî, og Jó´-ăb, og
Ás´-ă-hĕl, tríggir.
17 Og Ă´-bĭ-gaîl föddi Á´-mâ-să:
og faðir Á´-mâ-să *var* Jē´-thĕr Ísj-
mēel-ĭt´-i.
18 ¶ Og Caleb Hĕz´-rŏn-s sonur
gat *børn* av Á´-zû-bŭh, ektakonu
sini, og av Jĕr´-ĭ-ōth: hennara synir
eru hesir; Jē´-sjĕr, og Sjō´-băb, og
Ăr´-dŏn.
19 Og tá ið Á´-zû-băh var deyð,
tók Caleb at sær Ē´-phrăth, sum
föddi honum Hūr.
20 Og Hūr gat Ū´-rī, og Ū´-rī gat
Bĕz-á´-lēel.
21 ¶ Og síðan fór Hĕz´-rŏn inn
til dóttur Má´-chĭr-s, faðir Gileads,
við hvørji hann giftist, tá ið hann
var trísinstjúgu ára gamalur; og
hon föddi honum Sē´-gŭb.
22 Og Sē´-gŭb gat Já´-ĭr, sum
hevði tríggjar og tjúgu staðir í
landi Gileads.
23 Og hann tók Gē´-sjûr, og
Ár´-ăm, við býum Já´-ĭr-s, frá teim-
um, við Kē´-năth, og býum tess,
enntá trísinstjúgu staðir. Allir
hesir *hoyrdu til* sona Má´-chĭr-s,
faðir Gileads.
24 Og eftir at Hĕz´-rŏn var deyð-
ur í Cā´-lĕb-êph´-ră-tăh, tá föddi
Á´-bĭ-ăh, kona Hĕz´-rŏn-s, honum
Asjur, faðir Tē´-kô-ă.
25 ¶ Og synirnir hjá Jê-ráh´-
mēel-i, tí fyrstafödda hjá Hĕz´-
rŏn-i, vóru, Rám hin fyrstiföddi,
og Bū´-nâh, og Ō´-rĕn, og Ō´-zĕm,
og Á´-hĭ-jăh.
26 Jê-ráh´-mēel hevði eisini eina
aðra konu, hvørs navn *var* Ăt´-ă-
râh; hon *var* móðir Ō´-năm-s.
27 Og synirnir hjá Rám-i, tí
fyrstafödda hjá Jê-ráh´-mēel-i, vóru,
Má´-ăz, og Já´-mĭn, og Ē´-kĕr.
28 Og synirnir hjá Ō´-năm-i
vóru, Sjăm´-mâ-ī, og Já´-dă. Og
synirnir hjá Sjăm´-mâ-ī; Nádab,
og Á´-bĭ-sjûr.
29 Og navnið hjá konu Á´-bĭ-
sjûr-s *var* Á´-bĭ-hâîl, og hon föddi
honum Áh´-băn, og Mó´-lĭd.
30 Og synirnir hjá Nádabi;
Sē´-lĕd, og Ăp´-pâ-ĭm: men Sē´-lĕd
doyði uttan børn.
31 Og synirnir hjá Ăp´-pâ-ĭm-i;
Ĭsj´-ī. Og synirnir hjá Ĭsj´-ī; Sjē´-
sjăn. Og børnini hjá Sjē´-sjăn-i;
Áh´-lâ-ī.
32 Og synirnir hjá Já´-dă,
bróður Sjăm´-mâ-ī-s; Jē´-thĕr, og
Jónathan: og Jē´-thĕr doyði uttan
børn.
33 Og synirnir hjá Jónathani;
Pē´-lĕth, og Zā´-zā. Hesir vóru
synirnir hjá Jê-ráh´-mēel-i.
34 ¶ Nú, Sjē´-sjăn hevði ong-
ar synir, men døtur. Og Sjē´-sjăn
hevði ein tænara, ein Egypta,
hvørs navn *var* Jâr´-hă.
35 Og Sjē´-sjăn gav dóttur sína
til Jâr´-hă-s, tænara síns, til konu;
og hon föddi honum Ăt´-tâ-ī.
36 Og Ăt´-tâ-ī gat Náthan, og
Náthan gat Zā´-băd,
37 Og Zā´-băd gat Ĕph´-lăl, og
Ĕph´-lăl gat Ō´-bĕd,
38 Og Ō´-bĕd gat Jehu, og Jehu
gat Â-zăr´-jăh,
39 Og Â-zăr´-jăh gat Hē´-lĕz, og
Hē´-lĕz gat Ĕl-ē-á´-săh,
40 Og Ĕl-ē-á´-săh gat Sĭs´-ă-maî,
og Sĭs´-ă-maî gat Sjăl´-lŭm,
41 Og Sjăl´-lŭm gat Jĕk-ă-mī´-ăh,
og Jĕk-ă-mī´-ăh gat Ê-lĭ-sjá´-mă.
42 ¶ Nú, synirnir hjá Calebi,
bróður Jê-ráh´-mēel-s, *vóru,* Mē´-
sjă, hansara fyrstiföddi, sum *var*
faðir Ziph-s; og synirnir hjá Mă-
rē´-sjâh, faðir Hē´-brŏn-s.

43 Og synirnir hjá Hē´-brŏn-i; Kōr´-ăh, og Tăp´-pū-ăh, og Rē´-kĕm, og Sjē´-mă.

44 Og Sjē´-mă gat Ráham, faðir Jŏr´-kō-ăm-s: og Rē´-kĕm gat Sjăm´-mâ-ī.

45 Og sonur Sjăm´-mâ-ī-s *var* Mā´-ŏn: og Mā´-ŏn *var* faðir Bĕth´-zūr-s.

46 Og Ē´-phâh, medkona Calebs, føddi Hár´-ăn, og Mó´-ză, og Gā´-zĕz: og Hár´-ăn gat Gā´-zĕz.

47 Og synirnir hjá Jâh´-dā-ī; Rē´-gĕm, og Jó´-thăm, og Gē´-sjăn, og Pē´-lĕt, og Ē´-phâh, og Sjá´-ăph.

48 Mā´-ă-châh, medkona Calebs, føddi Sjē´-bĕr, og Tĭr´-hā-năh.

49 Hon føddi eisini Sjá´-ăph, faðir Măd-măn´-năh; Sjē´-vă, faðir Măch-bē´-năh; og faðirin at Gĭ-bē´-ă: og dóttir Calebs *var* Ăch´-săh.

50 ¶ Hesir vóru synirnir hjá Calebi Húrs syni, hinum fyrstafødda hjá Ēph´-ră-tūh; Sjō´-băl — faðir Kĭr´-jăth-jē´-ă-rīm-s,

51 Săl´-mă — faðir Beth-lehem-s, Hăr´-ĕph — faðir Bĕth-gā´-dĕr-s.

52 Og Sjō´-băl, faðir Kĭr´-jăth-jē´-ă-rīm-s, hevði synir; Hă-rō´-ĕh, *og* helvtina av Măn-ā-hĕ-thĭt´-unum.

53 Og familjurnar av Kĭr´-jăth-jē´-ă-rīm; Ĭth-rĭt´-arnir, og Pū-hĭt´-ar-nir, og Sjū-mā-thĭt´-arnir, og Mĭsj-rā-ĭt´-arnir; av teimum komu Zā-rē-ă-thĭt´-arnir, og Ēsj-tâ-ū-lĭt´-arnir.

54 Synirnir hjá Săl´-mă; Bethlehem, og Nē-tôph-â-thĭt´-arnir, Ăt´-ă-rōth, hús Jó´-ăb-s, og helvtin av Măn-ā-hĕ-thĭt´-unum, Zōr-ĭt´-arnir.

55 Og familjurnar hjá teimum skriftlærdu, sum dvaldust í Já´-bĕz; Tī-rā-thĭt´-arnir, Sjĭm-ē-ă-thĭt´-arnir, *og* Sū-chă-thĭt´-ar*nir*. Hetta *eru* Kē-nĭt´-arnir, sum komu av Hăm´-măth-i, faðirinum at húsi Rē´-chăb-s.

KAPITUL 3

NÚ, hesir vóru synirnir hjá Dávidi, sum vórðu føddir honum í Hē´-brŏn; hin fyrstiføddi Amnon, av Ă-hĭn´-ō-ăm-i, Jĕz-rē´-ĕl-ĭt-ĭnn´-uni; hin næsti Dániel, av Ă´-bĭ-gâl-i, Carmelitinnuni:

2 Hin triðji, Ăb´-să-lŏm, sonur Má´-ă-chŭh, dóttur Tăl´-mâ-s kongs av Gē´-sjŭr: hin fjórði, Ăd-ō-nī´-jăh, sonur Hăg´-gĭth-ar:

3 Hin fimti, Sjĕph-ăt´-jăh av Á´-bĭ-tăl-i: hin sætti, Ĭ´-thrē-ăm, við Ēg´-lūh, konu síni.

4 *Hesir* seks vórðu føddir honum í Hē´-brŏn; og hann ríkti har sjey ár og seks mánaðir: og hann ríkti í Jerusalem tríati og trý ár.

5 Og hesir vórðu føddir honum í Jerusalem; Sjĭm´-ē-ă, og Sjō´-băb, og Náthan, og Sálomon, fýra, av Băth-sjū´-ă Ăm´-mĭ-ĕl-s dóttur:

6 Ĭb´-hâr eisini, og Ē-lī-sjá´-mă, og Ē-lĭph´-ĕ-lĕt,

7 Og Nó´-gâh, og Nĕph´-ĕg, og Já´-phĭ-ă,

8 Og Ē-lī-sjá´-mă, og Ē-lī´-ă-dă, og Ē-lĭph´-ĕ-lĕt, níggju.

9 *Hesir vóru* allir synirnir hjá Dávidi, umframt synirnar hjá medkonunum, og Tā´-mâr — systur teirra.

10 ¶ Og sonur Sálomons *var* Rē-hó´-bŏ-ăm, Á´-bĭ-ă sonur hansara, Á´-să sonur hansara, Jē-hō´-sjâ-phăt sonur hansara,

11 Jóram sonur hansara, Ă-hă-zí´-ăh sonur hansara, Jó´-ăsj sonur hansara,

12 Ă-mă-zī´-ăh sonur hansara, Â-zăr´-jăh sonur hansara, Jó´-thăm sonur hansara,

13 Áhaz sonur hansara, Hĕz-ē-kī´-ăh sonur hansara, Mă-năs´-sēh sonur hansara,

14 Ámon sonur hansara, Jó´-sī-ăh sonur hansara.

15 Og synirnir hjá Jó´-sī-ăh *vóru,* hin fyrstiføddi Jó´-hâ-năn,

hin annar Jĕ-hōĭ´-ă-kĭm, hin triðji Zĕd-ĕ-kī´-ăh, hin fjórði Sjăl´-lŭm.
16 Og synirnir hjá Jĕ-hōĭ´-ă-kĭm-i: Jĕc-ō-nī´-ăh sonur hansara, Zĕd-ĕ-kī´-ăh sonur hansara.
17 ¶ Og synirnir hjá Jēc-ō-nī´-ăh; Ăs´-sĭr, Să-lá´-thĭ-ĕl sonur hansara,
18 Măl-chī´-răm eisini, og Pĕ-dāĭ´-ăh, og Sjĕn-á´-zâr, Jĕc-ă-mī´-ăh, Hō´-sjă-mă, og Nĕd-ă-bī´-ăh.
19 Og synirnir hjá Pĕ-dāĭ´-ăh *vóru,* Zĕ-rŭb-bá´-bĕl, og Sjĭm´-ē-ī: og synirnir hjá Zĕ-rŭb-bá´-bĕl-i; Mĕ-sjŭl´-lăm, og Hă-năn´-jăh, og Sjĕ-lō´-mīth – systir teirra:
20 Og Hă-sjū´-băh, og Ō´-hĕl, og Bĕr-ĕ-chī´-ăh, og Hăs-ăd´-jăh, Jū-sjăb-hĕs´-ĕd, fimm.
21 Og synirnir hjá Hă-năn´-jăh; Pĕ-lăt´-jăh, og Jĕ-sāĭ´-ăh: synirnir hjá Rê-phāĭ´-ăh, synirnir hjá Arnan, synirnir hjá Ō-bă-dī´-ăh, synirnir hjá Sjĕch-ăn´-jăh.
22 Og synirnir hjá Sjĕch-ăn´-jăh; Sjĕm-āĭ´-ăh: og synirnir hjá Sjĕm-āĭ´-ăh; Hăt´-tūsj, og Ĭ´-gē-ăl, og Bă-rī´-ăh, og Nĕ-ăr´-jăh, og Sjá-phăt, seks.
23 Og synirnir hjá Nĕ-ăr´-jăh; Ē-lī-ō´-ē-nāĭ, og Hēz-ē-kī´-ăh, og Ăz´-rĭ-kăm, tríggir.
24 Og synirnir hjá Ē-lī-ō´-ē-nāĭ-i *vóru,* Hō-dāĭ´-ăh, og Ē´-lī-ăsj-īb, og Pĕ-lāĭ´-ăh, og Ăk´-kūb, og Jó-hâ-năn, og Dâ-lāĭ´-ăh, og Ă-nā´-nī, sjey.

KAPITUL 4

SYNIRNIR hjá Judah; Phâr´-ĕz, Hĕz´-rŏn, og Câr´-mī, og Hūr, og Sjō´-băl.
2 Og Rê-āĭ´-ăh, sonur Sjō´-băl-s, gat Já´-hăth; og Já´-hăth gat Ă´-hū-māĭ, og Lá´-hăd. Hetta *eru* familjurnar hjá Zôr-â-thīt´-unum.
3 Og hesir *vóru av* faðir Ē´-thăm-s; Jĕz´-rēel, og Ĭsj´-mă, og Ĭd´-băsj: og navnið hjá systur teirra *var* Hăz-ĕl-ĕl-pō´-nī:
4 Og Pĕn´-ū-ĕl, faðir Gē´-dôr-s, og Ē´-zĕr, faðir Hū´-sjăh. Hesir *eru* synirnir hjá Hūr-i, hinir fyrstuføddu hjá Ĕph´-ră-tăh, faðir Bethlehem-s.
5 ¶ Og Asjur, faðir Tē´-kô-ă, hevði tvær konur, Hē´-lŭh og Ná´-ă-rŭh.
6 Og Ná´-ă-răh føddi honum Á´-hû-zăm, og Hē´-phĕr, og Tē´-mē-nī, og Há-ă-hăsj´-tă-rī. Hesir *vóru* synirnir hjá Ná´-ă-rŭh.
7 Og synirnir hjá Hē´-lŭh *vóru,* Zē´-rĕth, og Jĕ-zō´-âr, og Ĕth´-năn.
8 Og Cōz gat Ánub, og Zō-bē´-băh, og familjur Ă-hâr´-hĕl-s Hâr´-ŭm-s sonar.
9 ¶ Og Já´-bēz var meiri ærusamur enn brøður hansara: og móðir hansara kallaði navn hansara Já´-bēz, sigandi, Av tí at eg føddi hann við sorg.
10 Og Já´-bēz kallaði á Guð Ísraels, sigandi, Á, at tú vildirt vælsignað meg í roynd *og veru,* og vaksið um bredda mín, og at hond tín mátti verið við mær, og at tú vildirt varðað *meg* frá illum, at tað má ikki grøta meg! Og Guð veitti honum tað sum hann fyrispurdi.
11 ¶ Og Chē´-lŭb, bróðir Sjū´-âh, gat Mē´-hîr, sum *var* faðir Ēsj´-tŏn-s.
12 Og Ēsj´-tŏn gat Bĕth-rā´-phă, og Pá´-sê-ăh, og Tē-hĭn´-năh, faðir Ĭr-ná´-hăsj. Hesir *eru* menn Rē´-chăh.
13 Og synirnir hjá Kē´-năz-i; Ōth´-nĭ-ĕl, og Sĕ-rāĭ´-ăh: og synirnir hjá Ōth´-nĭ-ĕl-i; Há´-thăth.
14 Og Mē-ō´-nō-thāĭ gat Ōph´-răh: og Sē-rāĭ´-ăh gat Jō´-ăb, faðir Chă-rá´-sjĭm-s dalsins; tí at teir vóru handverkarar.
15 Og synirnir hjá Calebi Jē´-phŭn-nêh syni; Ĭ´-rû, Ē´-lăh, og Ná´-ăm: og synirnir hjá Ē´-lăh, enntá Kē´-năz.
16 Og synirnir hjá Jĕ-hăl´-ĕ-lēēl-i; Ziph, og Zī´-phăh, Tĭ´-rĭ-ă, og Ăs´-ă-rēēl.

17 Og synirnir hjá Ezra *vóru,* Jē´-thĕr, og Mē´-rĕd, og Ē´-phĕr, og Jálon: og hon føddi Mirjam, og Sjăm´-mâ-ī, og Ĭsj´-băh — faðir Ēsj´-tē-mŏ´-ă.

18 Og kona hansara, Jē-hû-dī´-jăh, føddi Jē´-rĕd — faðir Gē´-dôr-s, og Hē´-bĕr — faðir Sŏ´-chō, og Jē-kū´-thī-ĕl — faðir Zā-nō´-ăh. Og hesir *eru* synir Bĭth´-ī-ŭh — dóttur Pharaohs, hvørja Mē´-rĕd tók.

19 Og synirnir hjá konu *hansara,* Hó-dī´-ŭh — systur Ná-hams, faðir Kē-ī´-lăh Găr-mīt´-a, og Ēsj´-tē-mŏ´-ă Má-ăch-â-thīt´-i.

20 Og synirnir hjá Sjī´-mŏn-i *vóru,* Amnon, og Rĭn´-năh, Bĕn-há´-năn, og Tī´-lŏn. Og synirnir hjá Ĭsj´-ī *vóru,* Zō´-hĕth, og Bĕn-zō´-hĕth.

21 ¶ Synirnir hjá Sjē´-lâh, syni Judah, *vóru,* Ēr — faðir Lē´-câh, og Lá´-ă-dăh — faðir Mă-rē´-sjâh, og familjurnar av húsi teirra sum virkaðu fint lín, av húsi Ăsj´-bē-ă,

22 Og Jō´-kĭm, og menninir úr Chô-zē´-bă, og Jó´-ăsj, og Sâr´-ăph, hvørjir høvdu harradømið í Mó-ab, og Jă-sjū´-bi-lē´-hĕm. Og *hetta eru* fornir lutir.

23 Hesir *vóru* leirkerasmiðirnir, og teir sum dvaldust millum plantna og runnagirðinga: har dvaldust teir hjá kongi til arbeiðs hans.

24 ¶ Synirnir hjá Símeoni *vóru,* Nē´-mŭ-ĕl, og Já´-mĭn, Já´-rĭb, Zē´-râh, *og* Sjā´-ŭl:

25 Sjăl´-lŭm sonur hansara, Mĭb´-săm sonur hansara, Mĭsj´-mă sonur hansara.

26 Og synirnir hjá Mĭsj´-mă; Hăm´-û-ĕl sonur hansara, Zăc´-chûr sonur hansara, Sjĭm´-ĕ-ī sonur hansara.

27 Og Sjĭm´-ĕ-ī hevði sekstan synir og seks døtur; men hansara brøður høvdu ikki mong børn, eiheldur margfaldaði øll teirra familja *seg,* líka *sum* børn Judah.

28 Og teir dvaldust í Bēēr´-sjĕ-bŭ, og Mō-lā´-dŭh, og Há´-zâr-sjū´-ăl,

29 Og í Bĭl´-hâh, og í Ē´-zĕm, og í Tō´-lăd,

30 Og í Bē´-thû-ĕl, og í Hŏr´-măh, og í Ziklag,

31 Og í Bĕth-mâr´-că-bōth, og Há´-zâr-sū´-sĭm, og í Bĕth-bîr´-ē-ī, og í Sjā-ă-rā´-ĭm. Hetta *vóru* staðir teirra at ríkjan Dávids.

32 Og teirra bygdir *vóru,* Ē´-thăm, og Á´-ĭn, Rimmon, og Tō´-chĕn, og Ăsj´-ăn, fimm staðir:

33 Og allar bygdirnar hjá teimum, sum *vóru* rundan um hinar somu staðirnar, at Bā´-ăl. Hetta *vóru* teirra bústaðir, og teirra ættartal.

34 Og Mē-sjō´-băb, og Jăm´-lēch, og Jó´-sjăh Ă-mă-zī´-ăh sonur,

35 Og Jó´-ĕl, og Jehu Jó-sīb´-jăh sonur, Sē-râ´-ăh sonar, Ás´-ī-ĕl-s sonar,

36 Og Ē-lī-ō´-ē-nâ-ī, og Jâ-ă-kō´-băh, og Jĕsj-ô-hâ´-ăh, og Á-sâ´-ăh, og Ăd´-ī-ĕl, og Jē-sĭm´-ī-ĕl, og Bē-nâ´-ăh,

37 Og Zī´-ză Sjī´-phī-s sonur, Ăl´-lŏn-s sonur, Jē-dâ´-ăh sonar, Sjĭm´-rī-s sonur, Sjĕm-â´-ăh sonar;

38 Hesir, nevndir við nøvnum *sínum, vóru* prinsar í familjum sínum: og hús fedra teirra øktist mikilliga.

39 ¶ Og teir fóru til innfaring Gē´-dôr-s, *enntá* at eystur síðuni av dalinum, at søkja beiti til fylgja sína.

40 Og teir funnu feitt beiti og gott, og landið *var* vítt, og stilt, og friðsamt; tí at *teir* hjá Ham-i høvdu dvalst har frá gomlum *av.*

41 Og hesir, skrivaðir við navni, komu á døgum Hēz-ē-kī´-ăh kongs av Judah, og slógu tjøld teirra, og bústaðirnar sum funnust har, og oyddu teir aldeilis at hesum degi, og dvaldust í rúmum

teirra: av tí at *tað var* beiti har til fylgja teirra.

42 Og *summir* teirra, *enntá* av sonum Símeons, fimm hundrað menn, fóru til Sē´-īr fjalls, havandi til høvuðsmanna sína Pē-lāt´-jāh, og Nē-ăr´-jāh, og Rê-phāī´-āh, og Ūz´-zī-ĕl, synir Ĭsj´-ī-s.

43 Og teir slógu restina av Â-măl-ĕk-ĭt´-unum, sum høvdu komist undan, og dvaldust har at hesum degi.

KAPITUL 5

NÚ, synir Reûbens, fyrstafødda Ísraels, (tí at hann *var* hin fyrstiføddi; men eftirsum at hann dálkaði song faðirs síns, varð hansara føðirættur givin sonum Jóseph<u>h</u>s Ísraels sonar: og ættartalið verður ei at verða roknað eftir føðirættinum.

2 Tí at Judah hevði yvirvág uppum brøður sínar, og av honum *kom* hin fremsti stjórnarin; men føðirætturin *var* Jóseph<u>h</u>s:)

3 Synirnir, *sigi eg,* hjá Reûbeni, fyrstafødda Ísraels, *vóru,* Há´-nŏc<u>h</u>, og Păl´-lû, Hĕz´-rŏn, og Câr´-mī.

4 Synirnir hjá Jó´-ĕl-i; Sjĕm-āī´-ăh sonur hansara, Gôg sonur hansara, Sjĭm´-ē-ī sonur hansara,

5 Mī´-căh sonur hansara, Rē-āī´-ă sonur hansara, Bā´-ăl sonur hansara,

6 Bēēr´-ăh sonur hansara, hvønn Tĭl´-găth-pĭl-nē´-sĕr kongur av Assýriu førdi burt *til fanga:* hann *var* prinsur hjá Reûbenitunum.

7 Og hansara brøður eftir familjum teirra, tá ið ættartalið av teirra ættarliðum varð roknað, *vóru* hinir fremstu, Jē´-ĭ-ĕl, og Zĕc<u>h</u>-ăr´-jāh,

8 Og Bē´-lă sonur Á´-zăz-ar, sonar Sjē´-mă, sonar Jó´-ĕl-s, sum dvaldist í Á´-rŏ-ĕr, alt at Nē´-bō og Bā´-ăl-mē´-ŏn:

9 Og eystureftir íbúði hann at innfaring oyðunnar frá ánni Ĕv-phrā´-tēs: av tí at teirra fenaður varð margfaldaður í landi Gileads.

10 Og á døgum Sauls fórdu teir kríggj við Hăg-ă-rīt´-arnar, sum fullu viðˆ hond teirra: og teir dvaldust í tjøldum teirra út gjøgnum alt eystur*land* Gileads.

11 ¶ Og Gáds børn dvaldust yvir av teimum, í landi Bá´-sjăn-s at Săl´-chŭh:

12 Jó´-ĕl hin fremsti, og Sjá´-phăn hin næsti, og Já´-ă-nāî, og Sjá´-phăt í Bá´-sjăn.

13 Og teirra brøður av húsi fedra teirra *vóru,* Mi<u>ch</u>ael, og Mē-sjŭl´-lăm, og Sjē´-bă, og Jó´-râ-ĭ, og Já´-c<u>h</u>ăn, og Zĭ´-ă, og Hē´-bĕr, sjey.

14 Hesir *eru* børn Á´-bī-hâil-s Hŭ´-rī-s sonar, Jă-rō´-ăh sonar, Gileads sonar, Mi<u>ch</u>aels sonar, Jĕ-sjīsj´-āī-s sonar, Jâh´-dō-s sonar, Bûz sonar;

15 Á´-hī Ăb´-dĭ-ĕl-s sonur, Gŭ´-nī-s sonar, fremstur av húsi fedra teirra.

16 Og teir dvaldust í Gilead í Bá´-sjăn, og í býum hennara, og í øllum forstaðum Sjâr´-ōn-s, uppiá *landa*mørkum teirra.

17 Allir hesir vórðu roknaðir eftir ættartølum á døgum Jó´-thăm-s kongs av Judah, og á døgum Jĕr-ŏ´-bô-ăm-s kongs av Ísrael.

18 ¶ Synirnir hjá Reûbeni, og Gáditarnir, og hálv ættargrein Mă-năs´-sēh, av reystum monnum, menn — førir fyri at bera skjøldur og svørð, og at skjóta við boga, og hegnigir í kríggi, *vóru* fýra og fjøruti túsund sjey hundrað og trísinstjúgu, sum fóru út til kríggið.

19 Og teir fórdu kríggj við Hăg-ă-rīt´-arnar, við Jē´-tûr, og Nĕph´-ĭsj, og Nó´-dăb.

20 Og teir vórðu hjálptir ímóti teimum, og Hăg-ă-rīt´-arnir vórðu

flýggjaðir inn í hond teirra, og allir sum við teim *vóru:* tí at teir róptu til Guðs í bardaganum, og hann varð bønaður av teimum; av tí at teir settu sítt álit á hann.

21 Og teir tóku burt teirra fenað; av teirra kamelum fimti túsund, og av seyði tvey hundrað og fimti túsund, og av asnum tvey túsund, og av monnum eitt hundrað túsund.

22 Tí at tað fullu niður mangir vignir, av tí at kríggið *var* av Guði. Og teir dvaldust í teirra støðum inntil fangaskapin.

23 ¶ Og børnini at hálvu ættargrein Mă-năs´-sēh dvaldust í landinum: teir øktust frá Bá´-sjan at Bā´-ăl-hĕr´-mŏn og Sē´-nîr, og at Hĕr´-mŏn fjalli.

24 Og hesir *vóru* høvdini av húsi fedra teirra, enntá Ē´-phĕr, og Ĭsj´-ī, og Ē´-lī-ĕl, og Ăz´-rī-ĕl, og Jeremiah, og Hō-dăv´-jăh, og Jâh´-dī-ĕl, mektigir reystsemis menn, navnframir menn, *og* høvdˇ av húsi fedra sína.

25 ¶ Og teir misbrutust ímóti Guði fedra sína, og fóru horandi eftir gudunum hjá fólki landsins, hvørjar Guð oyddi undan teimum.

26 Og Guð Ísraels østi upp anda Pŭl·s kongs av Assýriu, og anda Tĭl´-găth-pĭl-nē´-sĕr·s kongs av Assýriu, og hann bar teir burtur, enntá Reûbenitarnar, og Gáditarnar, og hálvu ættargrein Mănăs´-sēh, og førdi teir at Há´-lâh, og Hā´-bôr, og Hâr´-ă, og til ánna Gō´-zăn, at hesum degi.

KAPITUL 6

SYNIRNIR hjá Levī; Gĕr´-sjŏn, Kō´-hăth, og Mĕ-râr´-ī.

2 Og synirnir hjá Kō´-hăth-i; Amram, Ĭz´-hâr, og Hē´-brŏn, og Ŭz´-zī-ĕl.

3 Og børnini hjá Amram·i; Aaron, og Móses, og Mirjam. Synirnir eisini hjá Aaroni; Nádab, og Ă´-bĭ-hû, Ēl-ĕ-ā´-zâr, og Ĭth´-ă-mâr.

4 ¶ Ĕl-ĕ-ā´-zâr gat Phĭ´-nĕ-hăs, Phĭ´-nĕ-hăs gat Ă-bĭ-sjū´-ă,

5 Og Ă-bĭ-sjū´-ă gat Bŭk´-kī, og Bŭk´-kī gat Ŭz´-zī,

6 Og Ŭz´-zī gat Zĕr-ă-hī´-ăh, og Zĕr-ă-hī´-ăh gat Mĕ-râ´-ōth,

7 Mĕ-râ´-ōth gat Ă-măr´-jăh, og Ă-măr´-jăh gat Á´-hĭ-tŭb,

8 Og Á´-hĭ-tŭb gat Zā´-dŏk, og Zā´-dŏk gat Ă-hī´-mă-ăz,

9 Og Ă-hī´-mă-ăz gat Â-zăr´-jăh, og Â-zăr´-jăh gat Jó´-hâ-năn,

10 Og Jó´-hâ-năn gat Â-zăr´-jăh, (hann *tað er,* sum útførdi prestsembætið í templinum, sum Sálomon bygdi í Jerusalem:)

11 Og Â-zăr´-jăh gat Ă-măr´-jăh, og Ă-măr´-jăh gat Á´-hĭ-tŭb,

12 Og Á´-hĭ-tŭb gat Zā´-dŏk, og Zā´-dŏk gat Sjăl´-lŭm,

13 Og Sjăl´-lŭm gat Hĭl´-kī-ăh, og Hĭl´-kī-ăh gat Â-zăr´-jăh,

14 Og Â-zăr´-jăh gat Sĕ-râ´-ăh, og Sĕ-râ´-ăh gat Jĕ-hó´-zā-dăk,

15 Og Jĕ-hó´-zā-dăk fór *í fangaskap,* tá ið HARRIN bar burtur Judah og Jerusalem viðˆ hond Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr-s.

16 ¶ Synirnir hjá Levī; Gĕr´-sjŏm, Kō´-hăth, og Mĕ-râr´-ī.

17 Og hesi *veri* nøvnini hjá sonum Gĕr´-sjŏm-s, Lĭb´-nī, og Sjĭm´-ĕ-ī.

18 Og synirnir hjá Kō´-hăth-i *vóru,* Amram, og Ĭz´-hâr, og Hē´-brŏn, og Ŭz´-zī-ĕl.

19 Synirnir hjá Mĕ-râr´-ī; Mâh´-lī, og Mū´-sjī. Og hetta *eru* familjurnar hjá Levitunum samsvarandi við teirra fedrar.

20 Av Gĕr´-sjŏm-i; Lĭb´-nī sonur hansara, Já´-hăth sonur hansara, Zimmah sonur hansara,

21 Jó´-âh sonur hansara, Ĭd´-dō sonur hansara, Zē´-râh sonur hansara, Jê-ăt´-ĕ-râ sonur hansara.

22 Synirnir hjá Kō´-hăth-i; Ămmĭn´-ă-dăb sonur hansara, Kōr´-ăh sonur hansara, Ăs´-sîr sonur hansara,

23 Ēl´-kă-năh sonur hansara,

og Ĕb′-jă-săph sonur hansara, og Ăs′-sîr sonur hansara,
24 Tá′-hăth sonur hansara, Ū′-rĭ-ĕl sonur hansara, Ŭz′-zĭ-ăh sonur hansara, og Sjā′-ŭl sonur hansara.
25 Og synirnir hjá Ĕl′-kă-năh; Á′-mă-sâi, og Á′-hĭ-mōth.
26 *Hvat* Ĕl′-kă-năh *viðvíkur:* synirnir hjá Ĕl′-kă-năh; Zō′-phâi sonur hansara, og Náhath sonur hansara,
27 Ē′-lî-ăb sonur hansara, Jĕ-rō′-hăm sonur hansara, Ĕl′-kă-năh sonur hansara.
28 Og synirnir hjá Sámueli; hin fyrstiføddi Văsj′-nī, og Á′-bĭ-ăh.
29 Synirnir hjá Mĕ-râr′-ī; Mâh′-lī, Lĭb′-nī sonur hansara, Sjĭm′-ĕ-ī sonur hansara, Ūz′-zā sonur hansara,
30 Sjĭm′-ĕ-ă sonur hansara, Hăg′-gĭ-ăh sonur hansara, Ă-sâi′-ăh sonur hansara.
31 Og hesir *eru teir,* hvørjar Dávid setti yvir sangs-tænastuni í húsi HARRANS, eftir at ørkin hevði hvílu.
32 Og teir tæntu frammanfyri bústaði samkomu-tabernakkulsins við synging, inntil Sálomon hevði bygt hús HARRANS í Jerusalem: og *tá* vartaðu teir um sína tænastu samsvarandi við skifti sítt.
33 Og hesir *eru* teir sum vartaðu um við børnum sínum. Av sonum Kō-hăth-ĭt′-anna: Hē′-măn, ein sangari, sonur Jó′-ĕl-s, sonar Sjē′-mû-ĕl-s,
34 Sonar Ĕl′-kă-năh, sonar Jĕ-rō′-hăm-s, sonar Ē′-lĭ-ĕl-s, sonar Tó′-ăh,
35 Sonar Zuph-s, sonar Ĕl′-kă-năh, sonar Má′-hăth-s, sonar Á′-mă-sâi-s,
36 Sonar Ĕl′-kă-năh, sonar Jó′-ĕl-s, sonar Â-zăr′-jăh, sonar Zĕ-phăn′-jăh,
37 Sonar Tá′-hăth-s, sonar Ăs′-sîr-s, sonar Ĕb′-jă-săph-s, sonar Kōr′-ăh,
38 Sonar Ĭz′-hâr-s, sonar Kō′-hăth-s, sonar Levīs, sonar Ísraels.
39 Og hansara bróðir Á-săph, sum stóð við høgru hond hansara, *enntá* Á-săph, sonur Bĕr-ă-chĭ′-ăh, sonar Sjĭm′-ĕ-ă,
40 Sonar Michaels, sonar Bá-ă-sei′-ăh, sonar Măl′-chĭ-âh,
41 Sonar Ĕth′-nī-s, sonar Zē′-râh, sonar Ă-dâi′-ăh,
42 Sonar Ē′-thăn-s, sonar Zimmah, sonar Sjĭm′-ĕ-ī-s,
43 Sonar Já′-hăth-s, sonar Gĕr′-sjŏm-s, sonar Levīs.
44 Og teirra bróður, synir Mĕ-rârʹ-ī-s, *stóðu* við vinstru hondina: Ē′-thăn sonur Kīsj′-ī-s, sonar Abdī-s, sonar Măl′-lŭch-s,
45 Sonar Hăsj-ă-bī′-ăh, sonar Ă-mă-zī′-ăh, sonar Hĭl′-kī-ăh,
46 Sonar Amzī-s, sonar Bá′-nī-s, sonar Sjá′-mĕr-s,
47 Sonar Máh′-lī-s, sonar Mū′-sjī-s, sonar Mĕ-rârʹ-ī-s, sonar Levīs.
48 Teirra bróður eisini, Levitarnir, *vórðu* útnevndir at øllum háttarlagi av tænastu tabernakkuls húsar Guðs.
49 ¶ Men Aaron og hansara synir ofraðu uppiá brennioffurs-altarinum, og á roykilsis-altarinum, *og vóru útnevndir* til alt verkið hjá *plássinum* mest heilagum, og at gera eina sáttargerð fyri Ísrael, samsvarandi við alt sum Móses, tænari Guðs, hevði ábjóðað.
50 Og hesir *eru* synir Aarons; Ĕl-ĕ-ā′-zâr sonur hansara, Phĭ′-nĕ-hăs sonur hansara, Ă-bĭ-sjū′-ă sonur hansara,
51 Bŭk′-kī sonur hansara, Ūz′-zī sonur hansara, Zĕr-ă-hī′-ăh sonur hansara,
52 Mĕ-râi′-ōth sonur hansara, Ă-măr′-jăh sonur hansara, Á′-hĭ-tŭb sonur hansara,
53 Zā′-dŏk sonur hansara, Ă-hĭ′-mă-ăz sonur hansara.
54 ¶ Nú, hetta *eru* bústaðirnir hjá teimum út gjøgnum slottini hjá teimum í breddunum hjá

teimum, av sonum Aarons, av familjum Kō-hăth-ĭt´-anna: tí at teirra var luturin.

55 Og teir góvu teimum Hē´-brŏn í landi Judah, og forstaðirnar av tí rundan um tað.

56 Men akrar staðarins, og hansara bygdir, góvu teir til Calebs Jē´-phŭn-nēh sonar.

57 Og til sona Aarons góvu teir Judah staðir, *nevniliga,* Hē´-brŏn, skjólss*taðin,* og Lĭb´-năh við hansara forstaðum, og Jăt´-tĭr, og Ēsj´-tĕ-mō´-ă, við teirra forstaðum,

58 Og Hī´-lĕn við hansara forstaðum, Dē´-bĭr við hansara forstaðum,

59 Og Ăsj´-ăn við hansara forstaðum, og Bēth´-sjē-mēsj við hansara forstaðum:

60 Og burtur av ættargrein Benjamins; Gē´-bă við hansara forstaðum, og Á´-lē-mēth við hansara forstaðum, og Án´-ă-thōth við hansara forstaðum. Allir teirra staðir út gjøgnum teirra familjur *vóru* trettan staðir.

61 Og sonum Kō´-hăth-s, *sum vóru* eftir av familjuni av teirri ættargreinini, *vórðu staðir givnir* burtur úr hini hálvu ættargrein, *nevniliga, burtur úr* hini hálvu *ættargrein* Mă-năs´-sēh, við lut*akast*i, tíggju staðir.

62 Og til sona Gĕr´-sjŏm-s út gjøgnum teirra familjur burtur úr ættargrein Ĭs´-să-chär-s, og burtur úr ættargrein Ásjers, og burtur úr ættargrein Năph´-tâ-lī-s, og burtur úr ættargrein Mă-năs´-sēh í Bá´-sjăn, trettan staðir.

63 Mē-rär´-ī-s sonum *vórðu givnir* við lut*akast*i, út gjøgnum teirra familjur, burtur úr ættargrein Reūbens, og burtur úr ættargrein Gáds, og burtur úr ættargrein Zē´-bŭ-lŏn-s, tólv staðir.

64 Og Ísraels børn góvu til Levitanna *hesar* staðir við teirra forstaðum.

65 Og teir góvu við lut*akast*i burtur úr ættargrein Judah barna, og burtur úr ættargrein Símeons barna, og burtur úr ættargrein Benjamins barna hesar staðir, sum eru kallaðir eftir nøvnum *teirra.*

66 Og *tær eftirverandi* av familjum Kō´-hăth-s sona høvdu staðir av breddum sínum burtur úr ættargrein Ē´-phrä-ĭm-s.

67 Og teir góvu teimum, *av* skjólsstaðunum, Sjē´-chĕm á Ē´-phrä-ĭm fjalli við hansara forstaðum; *teir góvu* eisini Gē´-zĕr við hansara forstaðum,

68 Og Jōk´-mē-ăm við hansara forstaðum, og Bēth-hór´-ōn við hansara forstaðum,

69 Og Aĭ´-jă-lōn við hansara forstaðum, og Gáth-rĭm´-mōn við hansara forstaðum:

70 Og burtur úr hálvu ættargrein Mă-năs´-sēh; Áner við hansara forstaðum, og Bĭ´-lē-ăm við hansara forstaðum, til familjuna hjá leivdini av sonum Kō´-hăth-s.

71 Innat sonum Gĕr´-sjŏm-s *vórðu givnir* burtur úr familjuni av hálvu ættargrein Mă-năs´-sēh, Gō´-lăn í Bá´-sjăn við hansara forstaðum, og Ăsj´-tă-rōth við hansara forstaðum:

72 Og burtur úr ættargrein Ĭs´-să-chär-s; Kē´-dēsj við hansara forstaðum, Dăb´-ē-răth við hansara forstaðum,

73 Og Rá´-mōth við hansara forstaðum, og Ánem við hansara forstaðum:

74 Og burtur úr ættargrein Ásjers; Má´-sjăl við hansara forstaðum, og Abdon við hansara forstaðum,

75 Og Hū´-kōk við hansara forstaðum, og Rē´-hōb við hansara forstaðum:

76 Og burtur úr ættargrein Năph´-tâ-lī-s; Kē´-dēsj í Galilēu við hansara forstaðum, og Hăm´-mōn við hansara forstaðum, og Kĭr-jâ-thá´-ĭm við hansara forstaðum.

77 Innat restini av børnum Mĕ-râr´-ī-s *vórðu givnir* burtur úr ættargrein Zĕ´-bŭ-lŏn-s, Rĭm´-mŏn við hansara forstaðum, Tā´-bôr við hansara forstaðum:
78 Og hīnumegin Jordan við Jericho, á eystur síðuni av Jordan, *vórðu givnir teimum* burtur úr ættargrein Reûbens, Bĕ´-zĕr í oyðuni við hansara forstaðum, og Jăh´-zāh við hansara forstaðum,
79 Kĕ´-dĕ-mōth eisini við hansara forstaðum, og Mĕph´-ā-āth við hansara forstaðum:
80 Og burtur úr ættargrein Gáds; Rá´-mōth í Gilead við hansara forstaðum, og Mă-há´-nă-ĭm við hansara forstaðum,
81 Og Hĕsj´-bŏn við hansara forstaðum, og Jā´-zĕr við hansara forstaðum.

KAPITUL 7

NÚ, synir Ĭs´-să-chār-s *vóru,* Tō´-lă, og Pŭ´-ăh, Já´-sjŭb, og Sjĭm´-rŏn, fýra.
2 Og synirnir hjá Tō´-lă; Ŭz´-zī, og Rê-phāĭ´-āh, og Jĕr´-ī-ĕl, og Jâh´-mâ-ī, og Jĭb´-săm, og Sjĕ´-mû-ĕl, høvd˘ av húsi faðirs teirra, *tað vil siga,* av Tō´-lă: *teir vóru* reystir megnar menn í ættarliðum sínum; hvørs tal *var* á døgum Dávids tvey og tjúgu túsund og seks hundrað.
3 Og synirnir hjá Ŭz´-zī; Ĭz-ră-hĭ´-ăh: og synirnir hjá Ĭz-ră-hĭ´-ăh; Michael, og Ó-bă-dĭ´-āh, og Jó´-ĕl, Ĭsj-ĭ´-āh, fimm: allir av teimum fremstir menn.
4 Og við teimum, eftir ættum teirra, eftir húsi fedra teirra, *vóru* lið˘ av hermonnum til kríggj, seks og tríati túsund *menn:* tí at teir høvdu mangar konur og synir.
5 Og teirra brøður millum allar familjur Ĭs´-să-chār-s *vóru* reystir megnar menn, roknaðir í alt eftir ættum sínum fýrsinstjúgu og sjey túsund.
6 ¶ *Synirnir* hjá Benjamini; Bĕ´-lă, og Bĕ´-chĕr, og Jĕd-ĭ-ā´-ĕl, tríggir.
7 Og synirnir hjá Bĕ´-lă; Ĕz´-bŏn, og Ŭz´-zī, og Ŭz´-zĭ-ĕl, og Jĕr´-ĭ-mōth, og Ĭ´-rī, fimm; høvd˘ av húsi fedra *sína,* mektigir reystsemis menn; og vórðu roknaðir eftir ættum sínum tjúgu og tvey túsund og tríati og fýra.
8 Og synirnir hjá Bĕ´-chĕr-i; Zĕ-mĭ´-rā, og Jó´-āsj, og Él-ĭ-ē´-zĕr, og Ĕ-lī-ō´-ē-nāî, og Ómrī, og Jĕr´-ĭ-mōth, og Á´-bĭ-āh, og Án´-ă-thōth, og Á´-lă-mĕth. Allir hesir *eru* synirnir hjá Bĕ´-chĕr-i.
9 Og talið á teimum, eftir teirra ættartali við teirra ættarliðum, høvd˘ av húsi fedra sína, mektigir reystsemis menn, *var* tjúgu túsund og tvey hundrað.
10 Synirnir eisini hjá Jĕd-ĭ-ā´-ĕl-i; Bilhan: og synirnir hjá Bilhan-i; Jē´-ûsj, og Benjamin, og Ē´-hŭd, og Chĕ-ná´-ă-năh, og Zē´-thăn, og Thâr´-sjĭsj, og Á-hĭ´-sjâ-hâr.
11 Allir hesir synirnir hjá Jĕd-ĭ-ā´-ĕl-i, eftir høvdum fedra sína, mektigir reystsemis menn, *vóru* seytjan túsund og tvey hundrað *hermenn,* egnaðir at fara út til kríggj *og* bardaga.
12 Sjŭp´-pĭm eisini, og Hŭp´-pĭm, børn Ĭr-s, *og* Hū´-sjĭm, synir Á´-hĕr-s.
13 ¶ Synirnir hjá Năph´-tâ-lī; Jáh´-zī-ĕl, og Gū´-nī, og Jē´-zĕr, og Sjăl´-lŭm, synirnir hjá Bĭl´-hŭh.
14 ¶ Synirnir hjá Mă-năs´-sēh; Ăsj´-rī-ĕl, hvønn hon føddi: (*men* hansara medkona, Ár-ăm-ĭt-ĭnn´-an, føddi Má´-chīr, faðir Gĭ´-lĕ-ăd-s:
15 Og Má´-chīr tók til konu *systur* Hŭp´-pĭm-s og Sjŭp´-pĭm-s, navnið hjá hvørs systur *var* Mā´-ă-chāh;) og navnið hjá hinum øðrum *var* Zê-lōph´-ĕ-hăd: og Zê-lōph´-ĕ-hăd hevði døtur.
16 Og Má´-ă-chāh, kona Má´-chīr-s, føddi ein son, og hon kallaði navn hansara Pĕ´-rĕsj; og navnið hjá bróður hansara *var*

Sjē´rēsj; og synirnir hjá honum *vóru* Ū´lăm og Rā´kĕm.

17 Og synirnir hjá Ū´lăm-i; Bē´dăn. Hesir *vóru* synirnir hjá Gī´lē-ăd-i, syni Má´chīr-s, syni Mănăs´sēh.

18 Og systir hansara, Hăm-mō´lē-kĕth, føddi Ī´sjŏd, og Ă-bī-ē´zĕr, og Mă-hā´lăh.

19 Og synirnir hjá Sjĕ-mī´dă vóru, Á´hī-ăn, og Sjē´chĕm, og Lĭk´hī, og Á´nī-ăm.

20 ¶ Og synirnir hjá Ē´phrăĭm-i; Sjū´thē-lâh, og Bē´rĕd sonur hansara, og Tá´hăth sonur hansara, og Ĕl´ă-dăh sonur hansara, og Tá´hăth sonur hansara,

21 ¶ Og Zā´băd sonur hansara, og Sjū´thē-lâh sonur hansara, og Ē´zĕr, og Ĕl´ē-ăd, hvørjar Gáths menn, *sum vóru* føddir í *tí* landinum, vógu, av tí at teir komu oman at taka burtur fenað teirra.

22 Og Ē´phră-ĭm, faðir teirra, syrgdi mangar dagar, og hansara brøður komu at ugga hann.

23 ¶ Og tá ið hann fór inn til konu sína, ól hon fram, og bar ein son, og hann kallaði navn hansara Bē-rī´ăh, av tí at tað gekk ilt við húsi hansara.

24 (Og dóttir hansara *var* Sjē´râh, hvør bygdi Bĕth-hór´ŏn hitt niðara, og hitt ovara, og Ūz´zĕn-sjē´râh.)

25 Og Rē´phâh *var* sonur hansara, eisini Rē´sjĕph, og Tē´lâh sonur hansara, og Tá´hăn sonur hansara,

26 Lá´ă-dăn sonur hansara, Ăm´mī-hŭd sonur hansara, Ê-lī-sjá´mă sonur hansara,

27 Nôn sonur hansara, Jē-hō´sjū-ă sonur hansara.

28 ¶ Og teirra ognir og teirra bústaðir *vóru,* Beth-el og býir tess, og eystureftir Ná´ă-răn, og vestureftir Gē´zĕr, við býum tess; Sjē´chĕm eisini og býir tess, at Gā´ză og býum tess:

29 Og við mørk Mă-năs´sēh barna, Bĕth-sjē´ăn og býir hans, Tā´ă-năch og býir hans, Mē-gĭd´dō og býir hans, Dōr og býir hans. Í hesum búðu synir Jóseph̲s Ísraels sonar.

30 ¶ Synirnir hjá Ásjer-i; Ĭm´năh, og Ĭs´û-ăh, og Ĭsj´û-aī, og Bērī´ăh, og Sē´răh — systir teirra.

31 Og synirnir hjá Bē-rī´ăh; Hē´bĕr, og Măl´chī-ĕl, sum *er* faðir Bĭr-zā´vĭth-s.

32 Og Hē´bĕr gat Jăph̲´lĕt, og Sjō´mĕr, og Hō´thăm, og Sjū´û, systur teirra.

33 Og synirnir hjá Jăph̲´lĕt-i; Pá´săch, og Bimhal, og Ăsj´văth. Hesir *eru* børn Jăph̲´lĕt-s.

34 Og synirnir hjá Sjá´mĕr-i; Á´hī, og Rōh´găh, Jē-hŭb´băh, og Ár´ăm.

35 Og synirnir hjá bróður hansara Hē´lĕm-i; Zō´phăh, og Ĭm´nă, og Sjē´lĕsj, og Á´măl.

36 Synirnir hjá Zó´phăh; Sū´ăh, og Hâr´nĕ-phĕr, og Sjū´ăl, og Bē´rī, og Ĭm´răh,

37 Bē´zĕr, og Hôd, og Sjăm´mă, og Sjĭl´sjăh, og Ĭth´răn, og Bēēr´ă.

38 Og synirnir hjá Jē´thĕr-i; Jē´phŭn-nĕh, og Pĭs´găh, og Âr´ă.

39 Og synirnir hjá Ūl´lă; Âr´ăh, og Hăn´ĭ-ĕl, og Rē´zĭ-â.

40 Allir hesir *vóru* børnini hjá Ásjer-i, høvdˇ av húsi faðirs *teirra,* úrvals *og* mektigir reystsemis menn, fremstir av prinsunum. Og talið út gjøgnum ættartalið hjá teimum sum vóru egnaðir til kríggið *og* til orrustu, *var* tjúgu og seks túsund menn.

KAPITUL 8

NÚ, Benjamin gat Bē´lă sín fyrstafødda, Ásj´bĕl hin annan, og Ă-hár´ăh hin triðja,

2 Nó´hâh hin fjórða, og Rā´phă hin fimta.

3 Og synirnir hjá Bē´lă vóru, Ăd´dâr, og Gē´ră, og Á´bĭ-hŭd,

4 Og Ă-bî-sjū´-ă, og Ná´-ă-măn, og Ă-hó´-ăh,
5 Og Gĕ´-ră, og Sjĕ-phū´-phăn, og Hū´-răm.
6 Og hesir *eru* synirnir hjá Ē´-hŭd-i: hesir eru høvdini hjá fedrunum av íbúgvum Gĕ´-bă, og teir burtfluttu teir til Măn´-ă-hăth:
7 Og Ná´-ă-măn, og Á´-hĭ-ăh, og Gĕ´-ră, hann burtflutti teir, og gat Úz´-ză, og Á´-hĭ-hŭd.
8 Og Sjâ-hă-rá´-ĭm gat *børn* í landi Móabs, eftir *at* hann hevði sent teir avstað; Hū´-sjĭm og Bā´-ă-ră *vóru* konur hansara.
9 Og hann gat av Hó´-dĕsj, konu síni; Jó´-băb, og Zĭ´-bĭ-ă, og Mĕ´-sjă, og Măl´-chăm,
10 Og Jĕ´-ŭz, og Sjă-chī´-ă, og Mĭr´-mă. Hesir *vóru* synir hansara, høvdˇ hjá fedrunum.
11 Og av Hū´-sjĭm gat hann Á´-hĭ-tŭb, og Ēl´-pâ-ăl.
12 Synirnir hjá Ēl´-pâ-ăl-i; Ē´-bĕr, og Mĭ´-sjăm, og Sjá´-mĕd, hvør bygdi Ō´-nō, og Lōd, við býum tess:
13 Bĕ-rĭ´-ăh eisini, og Sjĕ´-mă, hvørjir *vóru* høvdˇ hjá fedrunum av íbúgvum Aĭ´-jă-lŏn-s, sum róku burtur íbúgvar Gáths:
14 Og Á´-hî-ô, Sjá´-sjăk, og Jĕr´-ĕ-mōth,
15 Og Zĕb-ă-dĭ´-ăh, og Ár´-ăd, og Á´-dĕr,
16 Og Michael, og Ĭs´-păh, og Jó´-hă, synir Bĕ-rĭ´-ăh;
17 Og Zĕb-ă-dĭ´-ăh, og Mĕ-sjŭl´-lăm, og Hĕz´-ĕ-kī, og Hē´-bĕr,
18 Ĭsj´-mĕ-râi eisini, og Jĕz-lĭ´-ăh, og Jó´-băb, synir Ēl´-pâ-ăl-s;
19 Og Jákim, og Zĭch´-rī, og Zăb´-dī,
20 Og Êl-ĭ-ē´-naî, og Zĭl´-thaî, og Ē´-lĭ-ĕl,
21 Og Ă-daî´-ăh, og Bĕ-râî´-ăh, og Sjĭm´-răth, synir Sjĭm´-hī-s;
22 Og Ĭsj´-păn, og Hē´-bĕr, og Ē´-lĭ-ĕl,
23 Og Abdon, og Zĭch´-rī, og Há´-năn,
24 Og Hă-năn´-jăh, og Ē´-lăm, og Ăn-tô-thĭ´-jăh,
25 Og Ĭph-ĕ-dej´-ăh, og Pĕn´-ū-ĕl, synir Sjá´-sjăk-s;
26 Og Sjăm´-sjĕ-raî, og Sjê-hă-rĭ´-ăh, og Ăth-ăl´-jăh,
27 Og Jăr-ĕ-sĭ´-ăh, og Ē-lĭ´-ăh, og Zĭch´-rī, synir Jĕ-ró´-hăm-s.
28 Hesir *vóru* høvdˇ hjá fedrunum, eftir ættum sínum, fremstir *menn*. Hesir dvaldust í Jerusalem.
29 Og í Gibeon dvaldist faðir Gibeons; navnið hjá hvørs ektakonu *var* Mă´-ă-châh:
30 Og hansara fyrstiføddi sonur Abdon, og Zūr, og Kisj, og Bā´-ăl, og Nádab,
31 Og Gĕ´-dôr, og Á´-hî-ô, og Zá´-chĕr.
32 Og Mĭk´-lōth gat Sjĭm´-ĕ-ăh. Og hesir eisini dvaldust við brøðrum sínum í Jerusalem, yvir av teimum.
33 ¶ Og Nêr gat Kisj, og Kisj gat Saul, og Saul gat Jónathan, og Măl´-chî-sjū´-ă, og Ă-bĭn´-ă-dăb, og Ĕsj-bā´-ăl.
34 Og sonurin hjá Jónathani *var* Mêr´-íb-bā´-ăl; og Mêr´-íb-bā´-ăl gat Mĭ´-căh.
35 Og synirnir hjá Mĭ´-căh *vóru,* Pĭ´-thŏn, og Mĕ´-lĕch, og Tăr´-ĕ-ă, og Áhaz.
36 Og Áhaz gat Jĕ-hó´-ă-dăh; og Jĕ-hó´-ă-dăh gat Á´-lĕ-mĕth, og Ăz-má´-vĕth, og Zimrī; og Zimrī gat Mó´-ză,
37 Og Mó´-ză gat Bĭ´-nĕ-ă: Rā´-phă *var* sonur hansara; Ēl-ē-á´-săh sonur hansara, Ă´-zĕl sonur hansara:
38 Og Ă´-zĕl hevði seks synir, hvørs nøvn *eru* hesi, Ăz´-rĭ-kăm, Bō´-chĕ-rû, og Ísj´-mâ-ĕl, og Sjê-ă-rĭ´-ăh, og Ó-bă-dĭ´-ăh, og Há´-năn. Allir hesir *vóru* synir Ă´-zĕl-s.
39 Og synirnir hjá Ē´-sjĕk-i, bróður hansara, *vóru,* Ū´-lăm hansara fyrstiføddi, Jĕ´-hŭsj hin annar, og Ê-lĭph´-ĕ-lĕt hin triðji.

40 Og synirnir hjá Ū´-lăm-i vóru mektigir reystsemis menn, bogaskýttar, og høvdu mangar synir, og sonasynir, eitt hundrað og fimti. Allir hesir *eru* synir Benjamins.

KAPITUL 9

SO allur Ísrael vórðu roknaðir eftir ættartølum; og sí, teir *vórðu* skrivaðir í bók Ísraels og Judah konga, *hvørjir* bornir vórðu burtur til Bábylon fyri misbrot sítt.

2 ¶ Nú, teir fyrstu íbúgvarnir sum *dvaldust* í ognarlutum sínum í staðum sínum, *vóru* Ísraelitarnir, prestarnir, Levitar, og Nĕthĭ-nĭm´-arnir.

3 Og í Jerusalem dvaldust av børnum Judah, og av børnum Benjamins, og av børnum Ē´-phrā-ĭm-s, og Mă-năs´-sēh;

4 Ū´-thaî Ăm´-mī-hŭd-s sonur, Omrī-s sonur, Imrī-s sonur, Bá´-nī-s sonur, av børnum Phâr´-ēz-ar Judah sonar.

5 Og av Sjî-lô-nĭt´-unum; Ă-saî´-ăh hin fyrstiføddi, og synir hansara.

6 Og av sonum Zē´-râh; Jeū´-ĕl, og brøður teirra, seks hundrað og níti.

7 Og av sonum Benjamins; Săl´-lû Mĕ-sjŭl´-lăm-s sonur, Hō-dăv´-jăh sonar, Hās-ĕ-nū´-ăh sonar,

8 Og Ĭb-nēj´-ăh Jĕ-ró´-hăm-s sonur, og Ē´-lăh Ūz´-zī-s sonur, Mīch´-rī-s sonar, og Mĕ-sjŭl´-lăm Sjĕphăt´-jăh sonur, Reū´-ĕl-s sonar, Ĭb-nī´-jăh sonar;

9 Og teirra brøður, samsvarandi við teirra ættartøl, níggju hundrað og fimti og seks. Allir hesir menninir *vóru* fremstir av fedrunum í húsi fedra sína.

10 ¶ Og av prestunum; Jĕ-daî´-ăh, og Jĕ-hoî´-ă-rĭb, og Já´-chĭn,

11 Og Â-zăr´-jăh Hĭl´-kī-ăh sonur, Mĕ-sjŭl´-lăm-s sonar, Zā´-dŏk-s sonar, Mĕ-raî´-ōth-s sonar, Á´-hĭtŭb-s sonar, stjórnari húsar Guðs;

12 Og Ă-daî´-ăh Jĕ-ró´-hăm-s sonur, Păsj´-ûr-s sonar, Măl-chī´-jăh sonar, og Mâ-ăs-ĭ-ā´-ĭ Ăd´-ĭ-ĕl-s sonur, Jăh´-zĕ-răh sonar, Mĕ-sjŭl´-lăm-s sonar, Mĕ-sjĭl´-lĕ-mĭth-s sonar, Ĭm´-mĕr-s sonar;

13 Og teirra brøður, høvdˇ av húsi fedra sína, eitt túsund og sjey hundrað og trísinstjúgu; sera førir menn til verk tænastu húsar Guðs.

14 Og av Levitunum; Sjĕm-aî´-ăh Hăs´-sjŭb-s sonur, Ăz-rī´-kăm-s sonar, Hăsj-ă-bī´-ăh sonar, av sonum Mĕ-râr´-ī-s;

15 Og Băk-băk´-kâr, Hē´-rĕsj, og Gá´-lăl, og Măt-tă-nī´-ăh, sonur Mī´-căh, sonar Zĭch´-rī-s, sonar Á´-săph-s;

16 Og Ó-bă-dī´-ăh Sjĕm-aî´-ăh sonur, Gá´-lăl-s sonar, Jē´-dū-thûn-s sonar, og Bĕr-ĕ-chī´-ăh Á´-să sonur, Ĕl´-kă-năh sonar, sum dvaldust í bygdum Nē-tôph-â-thĭt´-anna.

17 Og duravørðirnir *vóru,* Săl´-lŭm, og Ăk´-kŭb, og Tăl´-mōn, og Á´-hĭ-măn, og brøður teirra: Săl´-lŭm *var* hin fremsti;

18 Hvørjir higartil *umvartaðu* í kongsportrinum eystantil: teir *vóru* duravørðir í flokkum Levīs barna.

19 Og Săl´-lŭm Kōr´-ê sonur, Ēb´-jă-săph-s sonar, Kōr´-ăh sonar, og hansara brøður, av húsi faðirs hansara, Kōr-ă-hĭt´-arnir, *vóru* yvir arbeiði tænastunnar, vørðir av tabernakkuls-portrunum: og teirra fedrar, *verandi* yvir herliði HARRANS, *vóru* vørðir av inngongdini.

20 Og Phī´-nē-hăs Ĕl-ē-ā´-zâr-s sonur var stjórnarin yvir teimum í lidnari tíð, *og* HARRIN *var* við honum.

21 *Og* Zĕch-ăr´-jăh Mĕ-sjĕl-ĕmī´-âh sonur *var* duravørður av dyrnum av samkomu-tabernaklinum.

22 Allir hesir, *sum vórðu* valdir at vera duravørðir í portrunum, *vóru* tvey hundrað og tólv. Hesir vórðu roknaðir eftir ættartali sínum í bygdum sínum, hvørjar Dávid og Sámuel síggjarin innsettu í teirra ásetta embæti.

23 So teir og teirra børn *høvdu* umsjónina av portrunum av húsi HARRANS, *nevniliga,* tabernakkulshúsinum, eftir vaktum.

24 Í fýra fjórðingum vóru duravørðirnir, ímóti eystan, vestan, norðan, og sunnan.

25 Og teirra bróður, *sum vóru* í bygdum teirra, *áttu* at koma eftir sjey dagar frá tíð til tíð við teimum.

26 Tí at hesir Levitarnir, teir fýra fremstu duravørðirnir, vóru í *sínum* ásetta embæti, og vóru yvir kømrum og dýrgripa*goymsl*um húsar Guðs.

27 ¶ Og teir hildu til rundan um hús Guðs, av tí at álegginginar *var* uppiá teimum, og upplatingin av tí hvønn morgun *hoyrdi* til teirra.

28 Og *ávísir* av teimum høvdu álegginginа av tænastu-reiðunum, at teir skuldu føra tey inn og út eftir tali.

29 *Summir* av teimum eisini *vórðu* útnevndir til at *hava* umsjón *við* reiðunum, og øllum amboðum halgidómsins, og tí fína mjølinum, og víninum, og oljuni, og roykilsinum, og kryddurtunum.

30 Og *summir* av prestasonunum gjørdu salvuna úr kryddurtunum.

31 Og Măt-tī-thī´-ăh, *ēin* av Levitunum, hvør *var* hin fyrstiføddi hjá Sjăl´-lŭm-i Kōr-ă-hīt´-a, hevði tað ásetta embætið yvir tingunum sum vórðu gjørd í pannunum.

32 Og *aðrir* av bróðrum teirra, av sonum Kō-hăth-īt´-anna, *vóru* yvir sýnisbreyðinum, at fyrireika *tað* hvønn sabbat.

33 Og hesir *eru* sangararnir, fremstir av fedrum Levitanna, *hvørjir, verðandi* í kømrunum, *vóru* fríir: tí at teir vóru starvsettir í *tí* starvi dag og nátt.

34 Hesir fremstu fedrarnir hjá Levitunum *vóru* fremstir út gjøgnum ættir sínar; hesir dvaldust í Jerusalem.

35 ¶ Og í Gibeon dvaldist faðir Gibeons, Jĕ´-hī-ĕl, navnið hjá hvørs konu *var* Mā´-ă-chăh:

36 Og hansara fyrstiføddi sonur Ăb´-dŏn, síðan Zūr, og Kisj, og Bā´-ăl, og Nêr, og Nádab,

37 Og Gĕ´-dôr, og Á´-hî-ô, og Zĕch-ăr´-jăh, og Mīk´-lōth.

38 Og Mīk´-lōth gat Sjīm´-ĕ-ăm. Og teir eisini dvaldust við bróðrum sínum í Jerusalem, yvir av bróðrum sínum.

39 Og Nêr gat Kisj; og Kisj gat Saul; og Saul gat Jónathan, og Măl´-chî-sjū´-ă, og Ă-bīn´-ă-dăb, og Ĕsj-bā´-ăl.

40 Og sonurin hjá Jónathani *var* Mêr´-íb-bā´-ăl: og Mêr´-íb-bā´-ăl gat Mī´-căh.

41 Og synirnir hjá Mī´-căh *vóru,* Pī´-thŏn, og Mĕ´-lĕch, og Thăh´-rĕ-ă, *og Áhaz.*

42 Og Áhaz gat Jâr´-ăh; og Jâr´-ăh gat Á´-lĕ-mĕth, og Ăz-má´-vĕth, og Zimrī; og Zimrī gat Mó´-ză;

43 Og Mó´-ză gat Bī´-nĕ-ă; og Rê-phâ´-ăh son hansara, Ēl-ĕ-á´-săh son hansara, Ă´-zĕl son hansara.

44 Og Ă´-zĕl hevði seks synir, hvørs nøvn *eru* hesi, Ăz-rī´-kăm, Bŏ´-chĕ-rû, og Ísj´-mâ-ĕl, og Sjê-ă-rī´-ăh, og Ó-bă-dī´-ăh, og Há´-năn: hesir *vóru* synir Ă´-zĕl-s.

KAPITUL 10

NÚ, Philistarnir bardust ímóti Ísrael; og menninir av Ísrael flýddu fyri framman ífrá Philistunum, og fullu niður vignir á Gīl-bŏ´-ă fjalli.

2 Og Philistarnir fylgdu hart

aftaná Sauli, og aftaná sonum hansara; og Philistarnir vógu Jónathan, og Ā-bīn´-ă-dăb, og Măl´-chī-sjŭ´-ă, synir Sauls.

3 Og bardagin gekk sárt ímóti Sauli, og bogaskýttarnir raktu hann, og hann varð særdur av bogaskýttunum.

4 Tá segði Saul til brynjubera sín, Drag svørð títt, og stoyt meg ígjøgn harvið; at ikki hesir óumskornu komi og misbrúki meg. Men hansara brynjuberi vildi ikki; tí at hann var sára ræddur. So Saul tók eitt svørð, og fell uppá tað.

5 Og tá ið hansara brynjuberi sá, at Saul var deyður, fell hann líkaleiðis á svørðið, og doyði.

6 So Saul doyði, og synir hansara tríggir, og alt hansara hús doyði tilsaman.

7 Og tá ið allir menninir av Ísrael, sum *vóru* í dalinum, sóu, at teir flýddu, og at Saul og synir hansara vóru deyðir, tá yvirgóvu teir staðir sínar, og flýddu: og Philistarnir komu og dvaldust í teimum.

8 ¶ Og tað hendi á morgisdeginum, tá ið Philistarnir komu at berka teir vignu, at teir funnu Saul og synir hansara falnar á Gīl-bō´-ă fjalli.

9 Og tá ið teir høvdu berkað hann, tóku teir høvur hansara, og brynju hansara, og sendu inn í land Philistanna runt umkring, at bera skurðgudum sínum tíðindir, og til fólksins.

10 Og teir settu hansara brynju í hús guds síns, og festu høvur hansara í templi Dā´-gŏn-s.

11 ¶ Og tá ið alt Já´-bĕsj-gī´-lĕăd hoyrdi alt sum Philistarnir høvdu gjørt við Saul,

12 Reistust teir, allir teir reystu menninir, og tóku burtur likamið av Sauli, og likamini av sonum hansara, og førdu tey til Já´-bĕsj, og jarðaðu teirra bein undir eikini í Já´-bĕsj, og fastaðu sjey dagar.

13 ¶ So Saul doyði fyri sítt misbrot sum hann framdi ímóti HARRANUM, *enntá* ímóti orði HARRANS, sum hann helt ikki, og eisini fyri at umbiðja *tilráðing* av *ēinari sum hevði* ein vælkunnugan anda, at fregna *av honum;*

14 Og fregnaði ikki av HARRANUM: tessvegna vá hann hann, og vendi kongadøminum at Dávidi Ísai-s syni.

KAPITUL 11

TÁ savnaði seg allur Ísrael til Dávids at Hē´-brŏn, sigandi, Sí, vit *eru* bein títt og kjøt títt.

2 Og harafturat í farnari tíð, sjálvt tá ið Saul var kongur, *vart* tú hann ið leiddirt út og førdirt inn Ísrael: og HARRIN tín Guð segði við teg, Tú skalt føða fólk mítt Ísrael, og tú skalt vera stjórnari yvir fólki mínum Ísrael.

3 Tí komu allir teir elstu av Ísrael til kongsins til Hē´-brŏn; og Dávid gjørdi ein sáttmála við teir í Hē´-brŏn frammi fyri HARRANUM; og teir salvaðu Dávid *til* kong yvir Ísrael, samsvarandi við orð HARRANS við Sámueli.

4 ¶ Og Dávid og allur Ísrael fóru til Jerusalem, sum *er* Jē´-bŭs; har Jēb-ŭ-sīt´-arnir *vóru,* íbúgvar landsins.

5 Og íbúgvarnir av Jē´-bŭs søgdu til Dávids, Tú skalt ikki koma higar. Hóast hetta, Dávid tók *víg*virki Zions, sum *er* staður Dávids.

6 Og Dávid segði, Hvørsumhelst *ið* slær Jēb-ŭ-sīt´-arnar fyrst, skal vera fremstur og høvuðsmaður. So Jó´-ăb Zĕr-ū´-jŭh sonur fór fyrstur upp, og varð fremstur.

7 Og Dávid dvaldist í *víg*virkinum; tí kallaðu teir tað stað Dávids.

8 Og hann bygdi staðin runt umkring, enntá frá Mĭl´-lō runt umkring: og Jó´-ăb umvældi restina av staðinum.

9 So Dávid vaks miklari og miklari: tí at HARRI herliðanna *var* við honum.

10 ¶ Hesir eisini *eru* teir fremstu av teimum mektigu monnunum sum Dávid hevði, hvørjir styrktu seg við honum í kongadømi hansara, *og* við øllum Ísrael, at gera hann *til* kong, samsvarandi við orð HARRANS viðvíkjandi Ísrael.

11 Og hetta *er* talið á teimum mektigu monnunum sum Dávid hevði; Já-sjŏb′-ĕ-ăm, ein Hăch-mô-nīt′-i, hin fremsti av høvuðsmonnunum: hann lyfti upp spjóti sínum ímóti trý hundrað, vignir *av honum* um ēina leið.

12 Og aftaná hann *var* Ĕl-ĕ-ā′-zâr Dodo-s sonur, Ă-hô-hīt′-in, sum *var ēin* av teimum trimum mektigu.

13 Hann var við Dávidi í Păs-dăm′-mĭm, og har vóru Philistarnir savnaðir saman til bardaga, hvar var eitt jarðarstykki fult av byggi; og fólkið flýddi frammanfyri ífrá Philistunum.

14 Og teir stillaðu seg í miðjuni av *tí* stykkinum, og útfríaðu tað, og vógu Philistarnar; og HARRIN bjargaði *teimum* við^ eini miklari útfrían.

15 ¶ Nú, tríggir av teimum tríati høvuðsmonnunum fóru oman til klettin til Dávids, inn í Adullams hellið; og herliðið hjá Philistunum leiraðist í Rē′-phă-ĭm-s-dalinum.

16 Og Dávid *var* tá í festninginum, og setuliðið hjá Philistunum *var* tá í Beth-lehem.

17 Og Dávidi longdist, og segði, Á, at ēin vildi givið mær drykk av vatninum úr Beth-lehem-s-brunninum, sum *er* við portrið!

18 Og teir tríggir brutu ígjøgnum herliðið hjá Philistunum, og drógu vatn úr Beth-lehem-s-brunninum, sum *var* við portrið, og tóku *tað,* og bóru *tað* til Dávids: men Dávid vildi ikki drekka *av* tí, men helti tað út til HARRANS,

19 Og segði, Guð mín sýti tað mær, at eg skuldi gjørt henda lut: skal eg drekka blóðið hjá hesum monnunum sum hava sett síni lív í váða? tí at við *váðasetingini av* sínum lívum bóru teir tað. Tí vildi hann ikki drekka tað. Hesi ting gjørdu hesir tríggir mektigastu.

20 ¶ Og Á′-bī-sjâ, bróðir Jó′-ăb-s, hann var fremstur teirra tríggja: tí, lyftandi upp spjóti sínum ímóti trý hundrað, vó hann *teir,* og hevði eitt navn teirra tríggja millum.

21 Av teimum trimum var hann meiri heiðursamur enn teir tveir; tí at hann var høvuðsmaður teirra: hvussu enn er, hann náddi ikki til hinna *fyrstu* tríggja.

22 Bĕ-nâ′-ăh Jĕ-hŏī′-ă-dă sonur, sonurin hjá einum reystum manni úr Kăb′-zēēl, hvør gjørt hevði mangar gerningar; hann vó tveir leyvu-líkar menn úr Móab: hann eisini fór oman og vó eina leyvu í eini holu á einum snjósomum degi.

23 Og hann vó ein Egypta, ein mann av *miklum* vakstrarmáli, fimm alnir høgur; og í hondini á Egyptanum *var* eitt spjót líka *sum* ein vevara-bummur; og hann fór oman til hansara við einum stavi, og sleit spjótið út úr hondini á Egyptanum, og vó hann við egna spjóti hansara.

24 Hesar *lutir* gjørdi Bĕ-nâ′-ăh Jĕ-hŏī′-ă-dă sonur, og hevði navnið millum hinna tríggja mektigu.

25 Sí, hann var heiðursamur millum hinna tríati, men náddi ikki til hinna *fyrstu* tríggja: og Dávid setti hann yvir lívverju síni.

26 ¶ Eisini teir reystu menninir av herunum *vóru* Ás′-ă-hĕl,

bróðir Jó´ăb-s; Ĕl-hā´năn, sonur Dodo-s úr Beth-lehem;
27 Sjăm´-mōth Hâr-ô-rĭt´-i, Hē´-lĕz Pê-lô-nĭt´-i,
28 Ĭ´-ră Ĭk´-kĕsj sonur Tĕ-kô-ĭt´-i; Á´-bī-ē´-zĕr Ăn-tô-thĭt´-i,
29 Sĭb´-bĕ-caî Hû-sjă-thĭt´-i, Ĭ´-lâ-ī Ă-hô-hĭt´-i,
30 Má´-hă-raî Nē-tôph-â-thĭt´-i; Hē´-lĕd Bā´-ă-năh sonur Nē-tôph-â-thĭt´-i;
31 Ĭ-thā´-ī Rī-bā´-ī-s sonur úr Gĭ-bē´-ŭh, *sum hoyrdi* til Benjamins barna; Bĕ-naí´-ăh Pî-râ-thŏn-ĭt´-i,
32 Hû-rā´-ī frá áarløkum Gá´-ăsj, Ā´-bĭ-ĕl Ăr-bă-thĭt´-i,
33 Ăz-má´-vĕth Bá-hă-rû-mĭt´-i, Ĕ-lĭ-âh´-bă Sjă-ăl-bō-nĭt´-i,
34 Synir Hăsj´-ĕm-s Gî-zô-nĭt´-a, Jónathan Sjá´-gē sonur Hâr-ă-rĭt´-i,
35 Á´-hĭ-ăm Sá´-châr-s sonur Hâr-ă-rĭt´-i, Ē´-lĭ-phăl Ūrs sonur,
36 Hē´-phĕr Mĕ-chê-ră-thĭt´-i, Á´-hĭ-jăh Pê-lô-nĭt´-i,
37 Hĕz´-rō Carmeliti, Nā´-ă-raî Ēz´-baî-s sonur,
38 Jó´-ĕl, bróðir Náthans; Mĭb´-hâr Hăg-gē´-rī-s sonur,
39 Zē´-lĕk Ammoniti, Ná´-hă-raî Bê-rô-thĭt´-i, brynjuberi Jó´-ăb-s Zĕr-ū´-jūh sonar;
40 Ĭ´-rā Ĭth-rĭt´-i, Gá´-rĕb Ĭth-rĭt´-i,
41 Ū´-rĭ-ăh Hittiti; Zā´-băd Áh´-lâ-ī-s sonur,
42 Ăd´-ī-nă Sjĭ´-zā sonur Reûbeniti, ein høvuðsmaður hjá Reûbenitunum, og tríati við honum,
43 Há´-năn Mā´-ă-châh sonur, og Jó´-sjă-phăt Mĭth-nĭt´-i,
44 Ūz´-zī-ă Ăsj-tē-ră-thĭt´-i; Sjá´-mă og Jē´-hĭ-ĕl, synir Hó´-thăn-s Ă-rō-ĕr-ĭt´-a,
45 Jĕd-ī-ă´-ĕl Sjĭm´-rī-s sonur, og Jó´-hă, bróðir hansara, Tî-zĭt´-i,
46 Ē´-lĭ-ĕl Má-hâ-vĭt´-i, og Jĕr-ī-bā´-ī, og Jó-sjă-vĭ´-ăh, synir Ēl-ná´-ăm-s, og Ĭth´-măh Móabiti,
47 Ē´-lĭ-ĕl, og Ō´-bĕd, og Jás´-ī-ĕl Mê-sô-bă-ĭt´-i.

KAPITUL 12

NÚ, hesir *eru* teir, sum komu til Dávids til Ziklag, meðan hann enn helt seg loyndan uppá grund av Sauli Kisj syni: og teir *vóru* millum hinna mektigu manna, hjálparar krígsins.
2 *Teir vóru* vápnaðir við bogum, og dugdu *at* bróka bæði ta høgru hondina og ta vinstru í *at sleingja* steinar og *at skjóta* ørvar úr einum boga, *enntá* av brøðrum Sauls av Benjamin.
3 Hin fremsti *var* Ă-hī-ē´-zĕr, síðan Jó´-ăsj, synir Sjĕm´-ă-ăh Gĭb-ĕ-ă-thĭt´-a; og Jĕ´-zī-ĕl, og Pē´-lĕt, synir Ăz-má´-vĕth-s; og Bĕ-rá´-chăh, og Jehu Ăn-tô-thĭt´-i,
4 Og Ĭs-maĭ´-ăh Gibeoniti, ein mektigur maður millum hinna tríati, og yvir teimum tríati; og Jeremiah, og Jă-há´-zī-ĕl, og Jó´-hă-năn, og Jós´-ă-băd Gĕ-dĕ-ră-thĭt´-i,
5 Ē-lū´-zaî, og Jĕr´-ī-mōth, og Bĕ-ă-lĭ´-ăh, og Sjĕm-ă-rĭ´-ăh, og Sjĕph-ăt´-jăh Hă-rû-phĭt´-i,
6 Ĕl´-kă-năh, og Jĕ-sĭ´-ăh, og Â-zá´-rēèl, og Jó-ē´-zĕr, og Jă-sjōb´-ĕ-ăm, Kôr-hĭt´-arnir,
7 Og Jó-ē´-lăh, og Zĕb-ă-dĭ´-ăh, synir Jĕ-ró´-hăm-s úr Gē´-dôr.
8 Og av Gáditunum atskildu seg sjálvar at Dávidi inn í festningin til oyðuna megnar menn, *og* krígsmenn – *egnaðir* til bardagan, sum dugdu *at* handfara skjøld og smáskjøld, hvørs andlit *vóru líka sum* andlitini á leyvum, og *vóru* so kvikir sum rádýrini uppiá fjøllunum;
9 Ē´-zĕr hin fyrsti, Ó-bă-dĭ´-ăh hin annar, Ē´-lī-ăb hin triðji,
10 Mĭsj-măn´-năh hin fjórði, Jeremiah hin fimti,
11 Ăt´-tâ-ī hin sætti, Ē´-lĭ-ĕl hin sjeyndi,
12 Jó´-hâ-năn hin áttandi, Ĕl-zā´-băd hin níggjundi,
13 Jeremiah hin tíggjundi, Măch-bá´-naî hin ellivti.

14 Hesir *vóru* av sonum Gáds, høvuðsmenn av herliðinum: ēin av teimum minstu *var* yvir hundrað, og hin størsti yvir túsund.

15 Hesir *eru* teir sum fóru yvirum Jordan í tí fyrsta mánaðinum, tá ið hon hevði yvirfloymt allar bakkar sínar; og teir settu á flótta allar *teir* úr dølunum, *bæði* ímóti eystri, og ímóti vestri.

16 Og tað komu av børnum Benjamins og Judah til festningin at Dávidi.

17 Og Dávid fór út at møta teimum, og tók til orða og segði við teir, Um tit veri komnir friðsamliga at mær at hjálpa mær, skal mítt hjarta verða knýtt at tykkum: men um *tit veri komnir* at svíkja meg til fígginda mína, við tað at *tað er* eingin órættur í hondum mínum, Guð fedra vára hyggi *hará,* og harti *tað*.

18 Tá kom andin uppá Á´-mă-sâi, *hvør var* fremstur av høvuðsmonnunum, *og hann segði,* Tínir *vær erum,* Dávid, og á tíni síðu, tú sonur Ísai-s: friður, friður *veri* at tær, og friður *veri* til hjálpara tína; tí at Guð tín hjálpir tær. Dávid tá tók ímóti teimum, og gjørdi teir *til* høvuðsmenn av liðinum.

19 Og tað fullu *summir* av Mă-năs´-sēh til Dávids, tá ið hann kom við Philistunum ímóti Sauli til bardaga: men teir hjálptu teimum ikki: tí at harrarnir hjá Philistunum eftir ráðførslu sendu hann avstað, sigandi, Hann vil falla til meistara síns, Sauls, til *váðasetingina av* okkara høvdum.

20 Sum hann fór til Ziklag, fullu tað til hansara av Mă-năs´-sēh Ăd´-nâh, og Jó´-zăb-băd, og Jĕd-ī-ă´-ĕl, og Michael, og Jó´-zăb-băd, og Ē´-lĭ-hū, og Zĭl´-thaî, høvuðsmenn av túsundunum sum *vóru* av Mă-năs´-sēh.

21 Og teir hjálptu Dávidi ímóti liðinum *av røvarunum:* tí at teir *vóru* allir mektigir reystsemis menn, og vóru høvuðsmenn í herliðinum.

22 Tí á *teirri* tíð dag um dag komu tað til Dávids til at hjálpa honum, inntil *tað var* eitt mikið herlið, líka *sum* herlið Guðs.

23 ¶ Og hetta *eru* tølini á liðunum, *sum vóru* klárt vápnaðir til kriggið, *og* komu til Dávids til Hē´-brōn, at venda kongadømi Sauls til hansara, samsvarandi við orð HARRANS.

24 Børn Judah, sum bóru skjøld og spjót, *vóru* seks túsund og átta hundrað, klárt vápnaðir til kríggið.

25 Av børnum Símeons, mektigir reystsemis menn til kríggið, sjey túsund og eitt hundrað.

26 Av børnum Levīs fýra túsund og seks hundrað.

27 Og Jē-hŏi´-ă-dă *var* leiðarin hjá Aaronitunum, og við honum *vóru* trý túsund og sjey hundrað;

28 Og Zā´-dŏk, ein ungur maður, mektigur til reystsemis, og av húsi faðirs hansara tjúgu og tveir høvuðsmenn.

29 Og av børnum Benjamins, ættarfólki Sauls, trý túsund: tí at meginparturin av teimum higartil hevði hildið varðhaldið av húsi Sauls.

30 Og av børnum Ē´-phră-ĭm-s tjúgu túsund og átta hundrað, mektigir reystsemis menn, navngitnir út gjøgnum hús fedra sína.

31 Og av hálvu ættargrein Mă-năs´-sēh átjan túsund, hvørjir úttryktir vórðu við navni, at koma og gera Dávid *til* kong.

32 Og av børnum Ĭs´-să-chār-s, *sum vóru menn* sum høvdu skyn á tíðunum, at vita hvat Ísrael átti at gera; høvdini av teimum *vóru* tvey hundrað; og allir bróðurnir hjá teimum *vóru* yvirfyri ábjóðan teirra.

33 Av Zē´-bŭ-lōn, slíkir sum

fóru fram til bardaga, alroyndir í kríggi, við øllum krígsamboðum, fimti túsund, sum dugdu *at* halda riðil: *teir vóru* ikki av einum tvíbýttum hjarta.

34 Og av Năph´-tâ-lī eitt túsund høvuðsmenn, og við teimum, við skjøldri og spjóti, tríati og sjey túsund.

35 Og av Dánitunum, alroyndir í kríggi, tjúgu og átta túsund og seks hundrað.

36 Og av Ásjeri, slíkir sum fóru fram til bardaga, alroyndir í kríggi, fjøruti túsund.

37 Og hīnumegin Jordan, av Reûbenitunum, og Gáditunum, og av hini hálvu ættargrein Mănăs´-sēh, við øllum háttarlagi av krígsamboðum til bardagan, eitt hundrað og tjúgu túsund.

38 Allir hesir krígsmenninir, sum dugdu *at* halda riðil, komu við einum fullkomnum hjarta til Hē´-brŏn, at gera Dávid *til* kong yvir øllum Ísrael: og øll restin eisini av Ísrael *vóru* av ēinum hjarta at gera Dávid *til* kong.

39 Og har vóru teir við Dávidi tríggjar dagar, etandi og drekkandi: tí at teirra brøður høvdu fyrireikað til teirra.

40 Harafturat teir sum vóru í nánd *við* teir, *enntá* at Ĭs´-să-chār og Zē´-bŭ-lŏn og Năph´-tâ-lī, førdu breyð á asnum, og á kamelum, og á múldjórum, og á oksum, *og* mat, mjøl, køkur av fikum, og bundir av rosinum, og vín, og olju, og oksar, og seyð ríkiligani: tí at *tað var* frøi í Ísrael.

KAPITUL 13

OG Dávid ráðførdist við høvuðsmenninar av túsundum og hundraðum, *og* við hvønn leiðara.

2 Og Dávid segði við alla samkomu Ísraels, Um *tað tyki* tykkum gott, og *at tað veri* av HARRANUM Guði várum, latum okkum senda útumkring at brøðrum várum allasteðs, *sum eru* eftir í øllum landi Ísraels, og við teimum *eisini* til prestanna og Levitanna, *sum eru* í staðum sínum *og* forstaðum, at teir mega savna seg at okkum:

3 Og latum okkum føra aftur ørk Guðs várs til okkara: tí at vit fregnaðu ikki hjá henni á døgum Sauls.

4 Og øll samkoman segði, at teir so vildu gera: tí at tingið var rætt í eygunum á øllum fólkinum.

5 So Dávid savnaði allan Ísrael saman, frá Sjī´-hôr Egyptalands enntá at innfaring Há´-măth-s, at føra ørk Guðs frá Kĭr´-jăth-jē´-ă-rĭm.

6 Og Dávid fór upp, og alt Ísrael, til Bā´-ă-lâh, *tað er,* til Kĭr´-jăth-jē´-ă-rĭm, sum *hoyrdi* til Judah, at føra upp haðani ørk Guðs HARRANS, sum býr *ímillum* chêrûbīm´-arnar, hvørs navn er kallað *á henni*.

7 Og teir bóru ørk Guðs í eini nýggjari kerru út úr húsi Ă-bīn´-ă-dăb-s: og Ŭz´-zā og Á´-hî-ô óku kerruna.

8 Og Dávid og allur Ísrael spældu frammi fyri Guði við øllum mátti *sínum*, og við synging, og við hørpum, og við psøltrum, og við tamburínum, og við skálatrummum, og við lúðrum.

9 ¶ Og tá ið teir komu at treskigólvi Chī´-dŏn-s, setti Ŭz´-zā fram sína hond at halda ørkini; tí at oksarnir stumlaðu.

10 Og vreiði HARRANS varð kynd ímóti Ŭz´-zā, og hann sló hann, av tí at hann setti hond sína til arkarinnar: og har hann doyði frammi fyri Guði.

11 Og Dávid varð misnøgdur, av tí at HARRIN hevði gjørt eitt skarð uppá Ŭz´-zā: hvørsvegna tað staðið er kallað Pē´-rēz-ŭz´-zā til henda dag.

12 Og Dávid varð ræddur fyri

Guði tann dagin, sigandi, Hvussu skal eg føra ørk Guðs *heim* til mín?

13 So Dávid førdi ikki ørkina *heim* til sín sjálvs til staðar Dávids, men bar hana til viks inn í hús Ō´-bĕd-ē´-dóm-s Gĭt-tĭt´-a.

14 Og ørk Guðs varð verandi hjá familjuni hjá Ō´-bĕd-ē´-dóm-i í húsi hansara tríggjar mánaðir. Og HARRIN vælsignaði hús Ō´-bĕd-ē´-dóm-s, og alt sum hann hevði.

KAPITUL 14

NÚ, Hiram kongur av Týrus sendi sendiboðar til Dávids, og timbur av sedris*trø*um, við múrarum og træsmiðum, at byggja honum eitt hús.

2 Og Dávid varnaðist, at HARRIN hevði staðfest hann kong yvir Ísrael, tí hansara kongadømi varð lyft upp til hæddar, uppá grund av fólki hans Ísrael.

3 ¶ Og Dávid tók fleiri konur í Jerusalem: og Dávid gat fleiri synir og døtur.

4 Nú, hesi *eru* nøvnini hjá børnum *hansara,* sum hann hevði í Jerusalem; Sjăm´-mû-ă, og Sjō´-băb, Náthan, og Sálomon,

5 Og Ĭb´-hâr, og Ê-lī´-sjû-ă, og Ĕl´-pă-lĕt,

6 Og Nó´-gâh, og Nĕp*h*´-ĕg, og Já´-p*h*ĭ-ă,

7 Og Ê-lī-sjá´-mă, og Bēēl´-jă-dă, og Ê-lĭp*h*´-ă-lĕt.

8 ¶ Og tá ið P*h*ilistarnir hoyrdu, at Dávid var salvaður *til* kong yvir øllum Ísrael, fóru allir P*h*ilistarnir niðan at søkja Dávid. Og Dávid hoyrdi *harum,* og fór út ímóti teimum.

9 Og P*h*ilistarnir komu og breiddu seg í Rē´-p*h*ă-ĭm-s dalinum.

10 Og Dávid fregnaði av Guði, sigandi, Skal eg fara niðan ímóti P*h*ilistunum? og vilt tú flýggja teir inn í hond mína? Og HARRIN segði við hann, Far niðan; tí at eg vil flýggja teir inn í hond tína.

11 So teir komu niðan til Bā´-ăl-pĕ-rā´-zĭm; og Dávid sló teir har. Tá segði Dávid, Guð hevur brotið inn uppá mínar figgindar við mini hond líka *sum* brótingin fram av vøtnum: tí kallaðu teir navnið á tí plássinum Bā´-ăl-pĕ-rā´-zĭm.

12 Og tá ið teir høvdu eftirlatið gudar sínar har, gav Dávid eina ábjóðan, og teir vórðu brendir við eldi.

13 Og P*h*ilistarnir enn eina ferðina breiddu seg útumkring í dalinum.

14 Dávid tessvegna fregnaði aftur av Guði; og Guð segði við hann, Legg ikki avstað eftir teimum; vend burtur frá teimum, og kom uppá teir yvir av morberjatrøunum.

15 Og tað skal verða, tá ið tú skalt hoyra eitt ljóð av ganging í toppunum av morberjatrøunum, *at* tá skalt tú fara út til orrustu: tí at Guð er gingin fram undan tær til at sláa herliðið hjá P*h*ilistunum.

16 Dávid tessvegna gjørdi eins og Guð ábjóðaði honum: og teir slógu herliðið hjá P*h*ilistunum frá Gibeon enntá til Gā´-zĕr.

17 Og navngitni Dávids fór út í øll lond; og HARRIN førdi óttan fyri honum uppá allar tjóðir.

KAPITUL 15

OG *Dávid* gjørdi sær hús í staði Dávids, og fyrireikaði eitt stað til ørk Guðs, og sló upp til hennara eitt tjald.

2 Tá segði Dávid, Eingin átti at borið ørk Guðs uttan Levitarnir: tí at teir hevur HARRIN valt at bera ørk Guðs, og at tæna at sær um ævir.

3 Og Dávid savnaði allan Ísrael saman til Jerusalem, at føra niðan ørk HARRANS at plássi hans,

sum hann hevði fyribúgvið til hennara.
4 Og Dávid savnaði saman børn Aarons, og Levitarnar:
5 Av sonum Kō´hăth-s; Ŭ´rĭ-ĕl hin fremsta, og hansara brøður eitt hundrað og tjúgu:
6 Av sonum Mĕ-râr´-ī-s; Ă-sâ´-ăh hin fremsta, og hansara brøður tvey hundrað og tjúgu:
7 Av sonum Gĕr´-sjŏm-s; Jó´-ĕl hin fremsta, og hansara brøður eitt hundrað og tríati:
8 Av sonum Ĕ-lĭ´-zăphăn-s; Sjĕm-âi´-ăh hin fremsta, og hansara brøður tvey hundrað:
9 Av sonum Hĕ´-brön-s; Ē´-lĭ-ĕl hin fremsta, og hansara brøður fýrsinstjúgu:
10 Av sonum Ŭz´-zĭ-ĕl-s; Ăm-mĭn´-ă-dăb hin fremsta, og hansara brøður eitt hundrað og tólv.
11 Og Dávid kallaði prestarnar Zā´-dŏk og Ā´-bĭ-ă-thâr, og Levitarnar, Ŭ´-rĭ-ĕl, Ă-sâ´-ăh, og Jó´-ĕl, Sjĕm-âi´-ăh, og Ē´-lĭ-ĕl, og Ăm-mĭn´-ă-dăb,
12 Og segði við teir, Tit *eru* teir fremstu av fedrunum hjá Levitunum: halgið tykkum sjálvar, *bæði* tit og brøður tykkara, at tit mega føra upp ørk HARRANS Guðs Ísraels at *plássinum sum* eg havi fyribúgvið til hennara.
13 Tí at av tí at tit *gjørdu tað* ikki í fyrstani, gjørdi HARRIN Guð vár eitt skarð uppá okkum, tí at vit søktu hann ikki eftir hini røttu skipan.
14 So prestarnir og Levitarnir halgaðu seg sjálvar til at føra niðan ørk HARRANS Guðs Ísraels.
15 Og børn Levitanna bóru ørk Guðs uppiá sínum herðum við stavunum hará, eins og Móses ábjóðaði samsvarandi við orð HARRANS.
16 Og Dávid talaði til hinna fremstu av Levitunum *um* at útnevna sínar brøður *til at vera* sangararnir við tónleiks-ljóðførum, psøltrum og hørpum og glymskálum, ljóðandi, við at hevja upp røddina við frøi.
17 So Levitarnir útnevndu Hĕ´-măn Jó´-ĕl-s son; og av hansara brøðrum, Á´-săph Bĕr-ĕ-chĭ´-ăh son; og av sonum Mĕ-râr´-ī-s, teirra brøðrum, Ē´-thăn Kū-sjaĭ´-ăh son;
18 Og við teimum teirra brøður av hini aðru *grad*, Zĕch-ăr´-jăh, Bĕn, og Jā-ā´-zĭ-ĕl, og Sjĕ-mĭ´-ră-mōth, og Jĕ´-hĭ-ĕl, og Ŭn´-nī, Ē´-lĭ-ăb, og Bĕ-năĭ´-ăh, og Mā-ă-sĕj´-ăh, og Măt-tĭ-thĭ´-ăh, og Ē-lĭph´-ĕ-lēh, og Mĭk-nĕj´-ăh, og Ō´-bĕd-ē´-dóm, og Jĕ´-ĭ-ĕl, duravørðirnar.
19 So *at* sangararnir, Hĕ´-măn, Á´-săph, og Ē´-thăn, *vórðu útnevndir* til at ljóða við glymskálum av messing;
20 Og Zĕch-ăr´-jăh, og Á´-zĭ-ĕl, og Sjĕ-mĭ´-ră-mōth, og Jĕ´-hĭ-ĕl, og Ŭn´-nī, og Ē´-lĭ-ăb, og Mā-ă-sĕj´-ăh, og Bĕ-năĭ´-ăh, við psøltrum á Ăl´-ă-mōth;
21 Og Măt-tĭ-thĭ´-ăh, og Ē-lĭph´-ĕ-lēh, og Mĭk-nĕj´-ăh, og Ō´-bĕd-ē´-dóm, og Jĕ´-ĭ-ĕl, og Ăz-ă-zĭ´-ăh, við hørpum á Sjĕm-ĭn-ĭth´-inum til at skara framúr.
22 Og Chĕn-ă-nĭ´-ăh, fremstur av Levitunum, *var* til sang: hann leiðbeindi kring sangin, av tí at hann *var* hegnigur.
23 Og Bĕr-ĕ-chĭ´-ăh og Ĕl´-kă-năh *vóru* durarvørðir hjá ørkini.
24 Og Sjĕb-ă-nĭ´-ăh, og Jĕ-hō´-sjâ-phăt, og Nĕth-á´-nēel, og Á-mā-sâi, og Zĕch-ăr´-jăh, og Bĕ-năĭ´-ăh, og Ēl-ĭ-ē´-zĕr, prestarnir, blástu við lúðrunum frammanfyri ørk Guðs: og Ō´-bĕd-ē´-dóm og Jĕ-hĭ´-ăh *vóru* durarvørðir hjá ørkini.
25 ¶ So Dávid, og hinir elstu av Ísrael, og høvuðsmenninir yvir túsundum, fóru at føra upp ørk sáttmála HARRANS út úr húsi Ō´-bĕd-ē´-dóm-s við frøi.
26 Og tað bar á, tá ið Guð hjálpti Levitunum sum bóru ørk

sáttmála HARRANS, at teir ofraðu sjey ungtarvar og sjey veðrar.

27 Og Dávid *var* klæddur við eini skikkju av fínum líni, og allir Levitarnir sum bóru ørkina, og sangararnir, og Chĕn-ă-nī´-ăh — meistari sangsins við sangarunum: Dávid eisini *hevði* uppiá sær eina ê-phōd´-u av líni.

28 Soleiðis førdi upp allur Ísrael ørk sáttmála HARRANS við rópan, og við ljóði av kornettini, og við lúðrum, og við glymskálum, gerandi eitt ljóð við psøltrum og hørpum.

29 ¶ Og tað bar á, *sum* ørk sáttmála HARRANS kom til staðar Dávids, at Michal, dóttir Sauls, lítandi út við ein glugga, sá kong Dávid dansandi og spælandi: og hon vanvirdi hann í hjarta sínum.

KAPITUL 16

SO teir førdu ørk Guðs, og settu hana í miðjum tjaldinum, sum Dávid hevði slígið upp til hennara: og teir ofraðu brenni-sláturoffur˘ og friðoffur˘ frammi fyri Guði.

2 Og tá ið Dávid hevði lokið við at ofra brenniofrini og friðofrini, vælsignaði hann fólkið í navni HARRANS.

3 Og hann útlutaði til hvønn *og* ein av Ísrael, bæði mann og kvinnu, til hvønn *og* ein eitt heilbreyð, og eitt gott stykki av kjøti, og eina karaflu *av vini*.

4 ¶ Og hann útnevndi *ávísar* av Levitunum at tæna frammanfyri ørk HARRANS, og at skráseta, og at takka og prísa HARRANUM Guði Ísraels:

5 Á-săph hin fremsti, og næstur mót honum Zĕch-ăr´-jăh, Jĕ-î-ĕl, og Sjĕ-mī´-ră-mōth, og Jĕ´-hī-ĕl, og Măt-tī-thī´-ăh, og Ē´-lī-ăb, og Bĕ-nāi´-ăh, og Ō´-bĕd-ē´-dóm: og Jĕ´-î-ĕl við psøltrum og við hørpum; men Á-săph gjørdi eitt ljóð við glymskálum;

6 Bĕ-nāi´-ăh eisini og Jă-há´-zī-ĕl, prestarnir, við lúðrum áframhaldandi frammanfyri ørk sáttmála Guðs.

7 ¶ Tá, á tí degi, flýggjaði Dávid fyrst *henda psálm* til at takka HARRANUM inn í hond Á-săph-s og bróðra hans.

8 Gevið tøkkir at HARRANUM, kallið uppá hans navn, gerið kunnar hans gerðir millum fólksins.

9 Syngið honum, syngið psálmar at honum, talið tit um øll hans undurfullu verk.

10 Dýrdist tit í hans heilaga navni: lat hjarta teirra fegnast, sum søkja HARRAN.

11 Søkið HARRAN og hansara styrki, søkið hans andlit støðugt.

12 Minnist hans undurfullu verk sum hann hevur gjørt, hans undur˘, og dómarnar av hansara munni;

13 Ó tit sáð Ísraels, tænara hans, tit børn Jákobs, hinir útvaldu hans.

14 Hann *er* HARRIN vár Guð; hans dómar á allari jørðini *eru*.

15 Verið tit minnugir altíð um sáttmála hans; orðið, *sum* hann ábeyð til túsund ættir;

16 *Enntá um sáttmálan* sum hann gjørdi við Ábraham, og um hans eið at Ísaaki;

17 Og hevur staðfest hin sama til Jákobs til eina lóg, *og* til Ísraels *til* ein ævigtvarandi sáttmála,

18 Sigandi, Tær vil eg geva land Cānaans, lut arvs tykkara;

19 Tá ið tit vóru bert fáir, enntá *nakrir* fáir, og fremmandir í tí.

20 Og *tá ið* teir fóru frá tjóð til tjóð, og frá *ēinum* kongadømi til eitt annað fólk;

21 Loyvdi hann ongum manni at gera teim órætt: ja, hann formanaði kongar fyri teirra sakir;

22 *Sigandi,* Nertið ikki mínar salvaðu, og gerið prophetum mínum einkið mein.

23 Syngið HARRANUM, øll jørðin; sýnið fram frá degi til dags hansara frelsu.
24 Kunngerið hans dýrd hinna heidnu millum; hans undurbæru verk alra tjóða millum.
25 Tí at stórur *er* HARRIN, og stórliga at verða prísaður: hann eisini *eigur* at verða óttaður uppum allar gudar.
26 Tí at allir gudar fólksins *eru* skurðgudar: men HARRIN gjørdi himnarnar.
27 Dýrd og heiður *eru* í nærveru hans; styrki og gleði *eru* í plássi hans.
28 Gevið HARRANUM, tit ættarfólk fólksins, gevið HARRANUM dýrd og styrki.
29 Gevið HARRANUM dýrdina, *skyldug* hans navni: komið við einum ofri, og komið framfyri hann: tilbiðjið HARRAN í vakurleikanum av heilagleika.
30 Óttast frammi fyri honum, øll jørðin: verøldin eisini skal vera støðug, at hon ei verði flutt.
31 Lat himnarnar vera glaðar, og lat jørðina fegnast: og lat *menn* siga tjóðanna millum, HARRIN ríkir.
32 Lat sjógvin ýla, og fylling hans: lat akrarnar fegnast, og alt sum *er* harí.
33 Tá skulu skógarins trø syngja út fyri nærveru HARRANS, av tí at hann kemur til at døma jørðina.
34 O gevið HARRANUM tøkkir; tí at góður *hann er;* tí hansara miskunn *varir* um ævir.
35 Og sigið tit, Frels okkum, O Guð frelsu várar, og savna okkum saman, og útfría okkum frá teimum heidnu, at vit mega geva tøkkir til heilaga navns tíns, *og* dýrdast í tíni prísan.
36 Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Ísraels um ævir og ævir. Og alt fólkið segði, Á-měn, og prísaði HARRANUM.
37 ¶ So hann eftirlæt har frammanfyri ørk sáttmála HARRANS Á-săph og brøður hans, at tæna frammanfyri ørkini støðugt, sum verkið hjá hvørjum degi kravdi:
38 Og Ō-bĕd-ē-dóm við teirra brøðrum, trísinstjúgu og átta; Ō-bĕd-ē-dóm eisini, son Jē-dŭ-thûn-s, og Hó-săh *til at vera* duravørðir:
39 Og Zā-dŏk prest, og hansara brøður, prestarnar, frammanfyri tabernakkul HARRANS í tí høga plássinum sum *var* í Gibeon,
40 At ofra HARRANUM brennioffur˘ uppiá brennioffurs-altarinum støðugt morgun og kvøld, og *at gera* samsvarandi við alt sum skrivað stendur í lóg HARRANS, sum hann ábjóðaði Ísrael;
41 Og við teimum Hē-măn og Jē-dŭ-thûn, og restina sum vóru valdir, hvørjir úttryktir vóru við navni, at geva tøkkir til HARRANS, av tí at hansara miskunn *varir* um ævir;
42 Og við teimum Hē-măn og Jē-dŭ-thûn við lúðrum og glymskálum fyri teir sum skuldu gera eitt ljóð, og við tónleiksligum ljóðførum Guðs. Og synir Jē-dŭ-thûn-s *vóru* duravørðir.
43 Og alt fólkið fór avstað, hvør maður til hús sítt: og Dávid vendi aftur at vælsigna hús sítt.

KAPITUL 17

NÚ, tað bar á, sum Dávid sat í húsi sínum, at Dávid segði til Náthan prophets, Sí, eg búgvi í einum húsi av sedristrøum, men ørk sáttmála HARRANS *er verandi* undir tjalddúkum.
2 Tá segði Náthan við Dávid, Ger alt sum *er* í hjarta tínum; tí at Guð *er* við tær.
3 ¶ Og tað bar á ta somu náttina, at orð Guðs kom til Náthans, sigandi,
4 Far og sig Dávidi, tænara mínum, Svá sigur HARRIN, Tú

skalt ikki byggja mær eitt hús at dvøljast í:

5 Tí at eg havi ikki búð í einum húsi síðan tann dag sum eg førdi upp Ísrael, at hesum degi; men eri farin frá tjaldi til tjald, og frá *ēinum* tabernakli *til eitt annað*.

6 Hvarsumhelst *ið* eg havi gingið við øllum Ísrael, talaði eg eitt orð til nakran av dómarum Ísraels, hvørjum eg ábjóðaði at føða fólk mítt, sigandi, Hví hava tit ikki bygt mær eitt hús av sedris*trø*um?

7 Nú tessvegna, svá skalt tú siga við tænara mín Dávid, Svá sigur HARRI herliðanna, Eg tók teg frá seyðabyrginum, *enntá* frá at fylgja seyðinum, at tú skuldirt vera stjórnari yvir fólki mínum Ísrael:

8 Og eg havi verið við tær hvagarsumhelst *ið* tú hevurt gingið, og havi skorið av allar tínar figgindar frammanfyri tær ífrá, og havi gjørt tær eitt navn líka *sum* navn hinna miklu manna sum *eru* á jørðini.

9 Eisini, eg vil fyriskipa eitt pláss til fólk mítt Ísrael, og vil planta teir, og teir skulu búgva í plássi sínum, og skulu ei meira verða fluttir; eiheldur skulu vondskunnar børn oyða teir meira, eins og at byrja við,

10 Og síðan ta tíð sum eg ábjóðaði dómarar *til at vera* yvir fólki mínum Ísrael. Harafturat, eg vil undirleggja allar tínar figgindar. Ennviðari sigi eg tær, at HARRIN vil byggja tær eitt hús.

11 ¶ Og tað skal bera á, tá ið dagarnir hjá tær verði útrunnir, at tú mást fara *til tess at vera* hjá fedrum tínum, at eg vil reisa upp sáð títt eftir teg, sum skal vera av sonum tínum; og eg vil staðfesta kongadømi hans.

12 Hann skal byggja mær eitt hús, og eg vil staðfesta hásæti hans um ævir.

13 Eg vil vera faðir hans, og hann skal vera sonur mín: og eg vil ikki taka mína miskunn burtur frá honum, eins og eg tók *hana* frá *honum* sum var undan tær:

14 Men eg vil støða hann í húsi mínum og í kongadømi mínum um ævir: og hansara hásæti skal verða staðfest um ævirmeir.

15 Samsvarandi við øll hesi orð, og samsvarandi við alla hesa sjón, soleiðis talaði Náthan við Dávid.

16 ¶ Og Dávid kongur kom og sat frammi fyri HARRANUM, og segði, Hvør *eri* eg, O HARRI Guð, og hvat *er* hús mítt, at tú hevurt ført meg higartil?

17 Og *tó* var hetta eitt lítið ting í eygum tínum, O Guð; tí at tú hevurt *eisini* talað um hús tænara tíns til mikla stund ið koma *skal*, og hevurt mett meg samsvarandi við støðuna hjá einum manni av høgum stigi, O HARRI Guð.

18 Hvat kann Dávid *tala* meira til tín til heiðurs tænara tíns? tí at tú kennirt tænara tín.

19 O HARRI, fyri skyld tænara tíns, og samsvarandi við egna hjarta títt, hevurt tú gjørt allan henda mikilleika, í at gera kunnar allar *hesar* miklu lutir.

20 O HARRI, *tað er* eingin sum tú, eiheldur *er tað nakar* Guð umframt teg, samsvarandi við alt sum vit hava hoyrt við oyrum várum.

21 Og hvør ēin*støk* tjóð á jørðini *er* líka *sum* fólk títt Ísrael, hvørjar Guð fór at endurloysa *til at vera* sítt egna fólk, at gera tær eitt navn av mikilleika og øgilligleika, við at reka út tjóðir frammi fyri tínum fólki ífrá, hvørjar tú hevurt endurloyst út úr Egyptalandi?

22 Tí at fólk títt Ísrael gjørdirt tú *til* egna fólk títt um ævir; og tú, HARRI, gjørdirst Guð teirra.

23 Tessvegna nú, HARRI, lat tað ting, sum tú hevurt talað viðvíkj-

andi tænara tínum og viðvíkjandi húsi hansara, verða grundfest um ævir, og ger sum tú hevurt sagt.

24 Lat tað enntá verða grundfest, at títt navn má verða stórgjørt um ævir, sigandi, HARRI herliðanna *er* Guð Ísraels, *enntá* ein Guð fyri Ísrael: og *lat* hús Dávids, tænara tíns, *vera* grundfest frammi fyri tær.

25 Tí at tú, O Guð mín, hevurt sagt tænara tínum, at tú vilt byggja honum eitt hús: tí hevur tænari tín funnið *í hjarta sínum* at biðja frammi fyri tær.

26 Og nú, HARRI, tú ert Guð, og hevurt fyrijáttað hesa góðsku at tænara tínum:

27 Nú tessvegna, lat tað tokna tær at vælsigna hús tænara tíns, at tað má vera frammi fyri tær um ævir: tí at tú vælsignart, O HARRI, og *tað skal vera* vælsignað um ævir.

KAPITUL 18

NÚ, eftir hetta bar tað á, at Dávid sló Philistarnar, og undirlegði teir, og tók Gáth og hennara býir út úr hondini á Philistunum.

2 Og hann sló Móab; og Móabitarnir gjørdust tænarar Dávids, *og* bóru gávur.

3 ¶ Og Dávid sló Hăd-ă-rē´-zĕr kong av Zō´-băh, at Há´-măth, sum hann fór at grundfesta harradømi sítt við ánna Ēv-phrā´-tēs.

4 Og Dávid tók frá honum eitt túsund vagnar, og sjey túsund hestmenn, og tjúgu túsund fótmenn: Dávid eisini hælsinu*kvetti* allar vagn*hest*arnar, men legði burturav av teimum eitt hundrað vagnar.

5 Og tá ið Sýriulendingarnir úr Damascus komu at hjálpa Hăd-ă-rē´-zĕr-i kongi av Zō´-băh, vá Dávid av Sýriulendingunum tvey og tjúgu túsund menn.

6 Tá setti Dávid *setulið* í Sýriudamascus; og Sýriulendingarnir gjørdust tænarar Dávids, *og* førdu gávur. Svá varðveitti HARRIN Dávid hvagarsumhelst hann fór.

7 Og Dávid tók skjøldrarnar av gulli, sum vóru á tænarum Hăd-ă-rē´-zĕr-s, og førdi teir til Jerusalem.

8 Somuleiðis frá Tĭb´-hăth, og frá Chŭn, staðum hjá Hăd-ă-rē´-zĕr-i, førdi Dávid sera nógvan messing, við hvørjum Sálomon gjørdi messing sjógvin, og súlurnar, og reiðini av messing.

9 ¶ Nú, tá ið Tó´-û kongur av Há´-măth hoyrdi, hvussu Dávid hevði sligið alt herliðið hjá Hăd-ă-rē´-zĕr-i kongi av Zō´-băh;

10 Sendi hann Há´-dōr-ăm, son sín, til kong Dávids, at fregna um hansara trivnað, og at ynskja honum tillukku, av tí at hann hevði barst ímóti Hăd-ă-rē´-zĕr-i, og sligið hann; (tí Hăd-ă-rē´-zĕr hevði kriggj við Tó´-û;) og *við honum* alt háttarlag av reiðum av gulli og silvuri og messing.

11 ¶ Tey eisini vígdi Dávid kongur at HARRANUM, við silvurinum og gullinum sum hann førdi frá øllum *hesum* tjóðunum; frá Ē´-dóm, og frá Móab, og frá børnum Ammons, og frá Philistunum, og frá Ā´-mâ-lēk.

12 Harafturat vá Á´-bĭ-sjâi Zĕrū´-jûh sonur av Ê-dóm-ĭt´-unum í salts-dalinum átjan túsund.

13 ¶ Og hann setti setulið í Ē´-dóm; og allir Ê-dóm-ĭt´-arnir gjørdust tænarar Dávids. HARRIN svá varðveitti Dávid hvagarsumhelst hann fór.

14 ¶ So Dávid ríkti yvir øllum Ísrael, og útinti dóm og rættvísi millum alt fólk sítt.

15 Og Jó´-ăb Zĕr-ū´-jûh sonur *var* yvir herliðinum; og Jĕ-hō´-sjâphăt Á´-hĭ-lŭd-s sonur skrásetari.

16 Og Zā´-dŏk Á´-hĭ-tūb-s sonur, og Â-bĭ´-mê-lĕch Ā´-bĭ-ă-thâr-s sonur, *vóru* prestarnir; og Sjăv´-sjă var skrivari;

17 Og Bĕ-năĭ´-ăh Jĕ-hōĭ´-ă-dă sonur *var* yvir Chĕr-ē-thĭt´-unum og Pē-lĕ-thĭt´-unum; og synirnir hjá Dávidi *vóru* fremstir kring kongin.

KAPITUL 19

NÚ, tað bar á eftir hetta, at Náhasj kongur Ammons barna doyði, og sonur hansara ríkti í hansara stað.

2 Og Dávid segði, Eg vil sýna blídni at Há´-nŭn-i Náhasj syni, av tí at faðir hansara sýndi blídni móti mær. Og Dávid sendi sendiboðar at ugga hann viðvíkjandi faðir hansara. So tænarar Dávids komu inn í land Ammons barna til Há´-nŭn-s, at ugga hann.

3 Men prinsarnir hjá Ammons børnum søgdu til Há´-nŭn-s, Heldurt tú, at Dávid ærir faðir tín, at hann hevur sent uggarar at tær? eru ikki tænarar hansara komnir at tær fyri at kanna, og at kollrenna, og at njósna út landið?

4 Hvørsvegna Há´-nŭn tók tænarar Dávids, og rakaði teimum, og skar av teirra klæðir í miðjuni, tætt við bøllar teirra, og sendi teir avstað.

5 Tá fóru tað *ávísir,* og søgdu Dávidi hvussu menninir vórðu tæntir. Og hann sendi at møta teimum: tí at menninir stórliga skammaðust. Og kongur segði, Steðgið í Jericho, inntil tykkara skegg verði vaksin, og *so* komið aftur.

6 ¶ Og tá ið Ammons børn sóu, at teir høvdu gjørt seg sjálvar illa-luktandi fyri Dávidi, sendu Há´-nŭn og Ammons børn eitt túsund talentir av silvuri til at leiga sær vagnar og hestmenn úr Mĕ-sō-pō-tā´-mĭ-ŭ, og úr Sýr´-ĭ-ŭ-má´-ă-chŭh, og úr Zō´-bŭh.

7 So teir leigaðu tríati og tvey túsund vagnar, og kongin av Má´-ă-chŭh og hansara fólk; hvørjir komu og slógu upp frammanfyri Mē´-dē-bŭ. Og Ammons børn savnaðu seg saman frá staðum sínum, og komu til orrustu.

8 Og tá ið Dávid hoyrdi *um tað,* sendi hann Jó´-ăb, og alt herliðið av teimum mektigu monnunum.

9 Og Ammons børn komu út, og stillaðu bardagan í uppstilling frammanfyri staðarportrinum: og kongarnir, sum vóru komnir, *vóru* fyri seg sjálvar í akrinum.

10 Nú, tá ið Jó´-ăb sá, at bardagin var settur ímóti honum frammanfyri og aftanfyri, valdi hann burtur úr øllum hinum úrvals av Ísrael, og stillaði *teir* í uppstilling ímóti Sýriulendingunum.

11 Og restina av fólkinum flýggjaði hann Á´-bĭ-sjāĭ-i, bróður sínum, í hond, og teir stillaðu *seg* í uppstilling ímóti Ammons børnum.

12 Og hann segði, Um Sýriulendingarnir veri ov sterkir fyri meg, tá skalt tú hjálpa mær: men um Ammons børn veri ov sterkir fyri teg, tá vil eg hjálpa tær.

13 Ver við gott treyst, og hátturn okkum reystliga fyri fólk várt, og fyri staðir Guðs várs: og lat HARRAN gera *tað sum er* gott í eygsjón hans.

14 So Jó´-ăb, og fólkið sum við honum *vóru,* nærkaðust frammanfyri Sýriulendingunum at orrustuni; og teir flýddu frammi fyri honum.

15 Og tá ið Ammons børn sóu, at Sýriulendingarnir vóru flýddir, flýddu teir somuleiðis frammi fyri Á´-bĭ-sjāĭ-i, bróður hansara, og innfóru inn í staðin. Síðan kom Jó´-ăb til Jerusalem.

16 ¶ Og tá ið Sýriulendingarnir sóu, at teir vóru settir til hins verra frammi fyri Ísrael, sendu teir sendiboðar, og drógu fram Sýriulendingarnar, sum *vóru* handan

ánna: og Sjṓ-phăch, høvuðsmaðurin av herliði Hăd-ă-rḗ-zĕr-s, *fór* frammanfyri teimum.

17 Og tað varð sagt Dávidi; og hann savnaði allan Ísrael, og fór yvirum Jordan, og kom uppá teir, og stillaði *bardagan* í uppstilling ímóti teimum. So tá ið Dávid hevði stillað bardagan í uppstilling ímóti Sýriulendingunum, bardust teir við hann.

18 Men Sýriulendingarnir flýddu frammi fyri Ísrael; og Dávid vá av Sýriulendingunum sjey túsund *menn sum bardust í* vagnum, og fjøruti túsund fótmenn, og drap Sjṓ-phăch, høvuðsmannin av herliðinum.

19 Og tá ið tænararnir hjá Hăd-ă-rḗ-zĕr-i sóu, at teir vóru settir til hins verra frammi fyri Ísrael, bundu teir frið við Dávid, og gjørdust tænarar hansara: eiheldur vildu Sýriulendingarnir hjálpa Ammons børnum meira.

KAPITUL 20

OG tað bar á, at eftir *at* árið var útrunnið, við ta tíðina tá ið kongar fara út *til bardaga,* leiddi Jó́-ăb fram mátt hersins, og oyddi land Ammons barna, og kom og kringsetti Răb́-băh. Men Dávid dvaldi í Jerusalem. Og Jó́-ăb sló Răb́-băh, og oyddi tað.

2 Og Dávid tók krúnu kongs teirra oman av høvdi hansara, og fann hana at viga eina talent av gulli, og *tað vóru* dýrabærir steinar í henni; og hon varð sett uppá høvur Dávids: og hann førdi eisini avbera miklan fong út úr staðinum.

3 Og hann førdi út fólkið sum í honum *vóru,* og skar *teir* við sagum, og við harvum av jarni, og við øksum. Enntá soleiðis fór Dávid við øllum staðum Ammons barna. Og Dávid og alt fólkið vendu aftur til Jerusalem.

4 ¶ Og tað bar á eftir hetta, at tað reistist kríggj í Gḗ-zĕr við Philistarnar; á hvørji tíð Sĭb́-bĕ-chāî Hû-sjă-thĭt́-i vá Sĭṕ-pā-ī, *sum var* av børnum risans: og teir vórðu undirlagdir.

5 Og tað var kríggj aftur við Philistarnar; og Ĕl-hā́-năn Já́-ĭr-s sonur vá Lâh́-mī, bróður Gṓ-lĭăth-s Gĭt-tĭt́-a, hvørs spjót-stavur *var* líka *sum* ein vevara bummur.

6 Og uppaftur var tað kríggj í Gáth, hvar var ein maður av *miklum* vakstrarmáli, hvørs fingrar og tær *vóru* fýra og tjúgu, seks *á hvørji hond,* og seks *á hvørjum fóti:* og hann eisini var sonur risans.

7 Men tá ið hann trossaði Ísrael, vó Jónathan Sjĭḿ-ē-ă sonur, bróður Dávids, hann.

8 Hesir vórðu føddir risanum í Gáth; og teir fullu viðˆ hendi Dávids, og viðˆ hendi tænaraˇ hans.

KAPITUL 21

OG Satan stóð upp ímóti Ísrael, og tirraði Dávid til at upptelja Ísrael.

2 Og Dávid segði til Jó́-ăb-s og til stjórnarnna av fólkinum, Farið, upptelji Ísrael frá Bēēŕ-sjē-bū enntá til Dán; og førið talið á teimum til mín, at eg má vita *tað.*

3 Og Jó́-ăb svaraði, HARRIN geri fólk sítt hundrað ferðir so mangar fleiri sum teir *veri seg:* men, harri mín kongur, *eru* teir ikki allir tænarar harra míns? hví tá krevur harri mín henda lut? hví vil hann vera ein orsøk til misbrot fyri Ísrael?

4 Hóast hetta, orðið hjá kongi hevði yvirvág ímóti Jó́-ăb-i. Hvørsvegna Jó́-ăb fór avstað, og fór út gjøgnum alt Ísrael, og kom til Jerusalem.

5 ¶ Og Jó́-ăb gav Dávidi samløguna av talinum á fólkinum. Og allir *teir av* Ísrael vóru eitt

túsund túsund og eitt hundrað túsund menn, sum drógu svørð: og Judah *var* fýra hundrað *og* trísinstjúgu og tíggju túsund menn, sum drógu svørð.

6 Men Levī og Benjamin taldi hann ikki teirra millum: tí at orðið hjá kongi var andstyggiligt fyri Jó´ăb-i.

7 Og Guð var misnøgdur við hetta ting; hann tessvegna sló Ísrael.

8 Og Dávid segði við Guð, Eg havi syndað stórliga, av tí at eg havi gjørt henda lut: men nú, eg bøni teg, bein burtur misgerð tænara tíns; tí at eg havi gjørt sera fávitskuliga.

9 ¶ Og HARRIN talaði innat Gádi, síggjara Dávids, sigandi,

10 Far og sig Dávidi, sigandi, Svá sigur HARRIN, eg bjóði tær trý *ting:* vel tær ēitt av teimum, at eg má gera *tað* at tær.

11 So Gád kom til Dávids, og segði við hann, Svá sigur HARRIN, Vel tær

12 Annaðhvørt trý ára hungursneyð; ella tríggjar mánaðir at verða oyddur frammi fyri fíggindum tínum, meðan ið svørðið hjá fíggindum tínum innheintar *teg;* ella annars tríggjar dagar svørð HARRANS, enntá drepsóttin, í landinum, og eingil HARRANS oyðandi út gjøgnum allar breddar Ísraels. Nú tessvegna, umráð teg, hvat orð eg skal bera aftur til hansara sum sendi meg.

13 Og Dávid segði við Gád, Eg eri í eini miklari trong*støðu:* lat meg falla nú inn í hond HARRANS; tí at sera miklar *eru* miskunnir hans: men lat meg ikki falla inn í hond mans.

14 ¶ So HARRIN sendi drepsótt omanyvir Ísrael: og tað fullu av Ísrael sjeyti túsund mans.

15 Og Guð sendi ein eingil at Jerusalem at oyða tað: og sum hann oyddi, skoðaði HARRIN, og hann iðraði seg um tað illa, og segði til eingilin sum oyddi, Tað er nóg *mikið,* steðga nú hond tíni. Og eingil HARRANS stóð við treskigólv Ŏr´-năn-s Jĕb-ŭ-sīt´-a.

16 Og Dávid lyfti upp eygum sínum, og sá eingil HARRANS standa ímillum jørðina og himinin, havandi eitt drigið svørð í hond síni, strekt út yvir Jerusalem. Tá fullu Dávid og teir elstu *av Ísrael, sum vóru* klæddir í sekkjaklæði, uppá andlit síni.

17 Og Dávid segði við Guð, *Er tað* ikki eg *sum* skipaði fólkið at verða upptalt? enntá eg tað eri, sum havi syndað og gjørt ilt í roynd *og veru;* men *hvat* hesum seyðum *viðvíkur,* hvat hava teir gjørt? lat tína hond, eg biði teg, O HARRI Guð mín, vera á mær, og á húsi faðirs míns; men ikki á fólki tínum, at teir skuldu verðið plágaðir.

18 ¶ Tá skipaði eingil HARRANS Gádi at siga til Dávids, at Dávid skuldi fara niðan, og seta upp eitt altar at HARRANUM í treskigólvi Ŏr´-năn-s Jĕb-ŭ-sīt´-a.

19 Og Dávid fór niðan við framsøgn Gáds, sum hann talaði í navni HARRANS.

20 Og Ŏr´-năn vendi aftur, og sá eingilin; og hansara fýra synir við honum fjaldu seg. Nú, Ŏr´-năn treskti hveiti.

21 Og sum Dávid kom til Ŏr´-năn-s, hugdi Ŏr´-năn og sá Dávid, og fór út av treskigólvinum, og boygdi seg til Dávids við andliti *sínum* til jarðarinnar.

22 Tá segði Dávid til Ŏr´-năn-s, Veit mær plássið av *hesum* treskigólvi, at eg má byggja eitt altar at HARRANUM hará: tú skalt veita tað mær fyri hin fulla prísin: at plágan má verða steðgað frá fólkinum.

23 Og Ŏr´-năn segði við Dávid, Tak *tað* til tín, og lat harra mín kong gera *tað sum er* gott í eygum hans: sí, eg gevi *tær* oksarnar

eisini til brennioffurˇ, og treskiamboðini til viðˇ, og hveitið til matofrið; eg gevi tað alt.

24 Og Dávid kongur segði til Ǒr´-năn-s, Nei; men eg vil sanniliga keypa tað fyri hin fulla prísin: tí at eg vil ikki taka *tað*, sum títt *er*, til HARRANS, ella ofra brennioffurˇ uttan kostnað.

25 So Dávid gav til Ǒr´-năn-s fyri plássið seks hundrað sjĕ´-kl-ar av gulli eftir vekt.

26 Og Dávid bygdi har eitt altar at HARRANUM, og ofraði brennioffurˇ og friðoffurˇ, og kallaði uppá HARRAN; og hann svaraði honum frá himni viðˆ eldi uppá brennioffurs-altarið.

27 Og HARRIN skipaði einglinum; og hann setti upp svørð sítt aftur inn í slíðra tess.

28 ¶ Á teirri tíð, tá ið Dávid sá at HARRIN hevði svarað honum í treskigólvi Ǒr´-năn-s Jĕb-ŭsīt´-a, tá ofraði hann har.

29 Tí at tabernakkul HARRANS, hvørt Móses gjørdi í oyðuni, og brennioffurs-altarið, *vóru* á tí tíðarbilinum í tí høga plássinum í Gibeon.

30 Men Dávid kundi ei fara framfyri tað at fregna av Guði: tí at hann var ræddur uppá grund av svørðinum hjá eingli HARRANS.

KAPITUL 22

TÁ segði Dávid, Hetta *er* hús HARRANS Guðs, og hetta *er* altar brennioffurs Ísraels.

2 Og Dávid skipaði at savna saman hinar fremmandu, sum *vóru* í landi Ísraels; og hann setti múrarar at høgga virkaðar steinar til at byggja hús Guðs.

3 Og Dávid fyribúði jarn í ríkiligleika til naglarnar til hurðarnar av portrunum, og til samankomingarnar; og messing í ríkiligleika, uttan vekt;

4 Eisini sedristrø í ríkiligleika: tí at Zî-dŏ´-nĭ-ararnir og teir úr Týrus førdu nógvan sedrisvið til Dávids.

5 Og Dávid segði, Sálomon, sonur mín, *er* ungur og bleytur, og húsið, *sum eigur* at verða bygt til HARRANS, *má vera* avbera stórfingið, av navngitni og av dýrd út gjøgnum øll lond: eg vil *tí* nú gera fyribúgving til tess. So Dávid fyribúði ríkiliga áðrenn deyða sín.

6 ¶ Tá rópaði hann Sálomon, son sín, og álegði honum at byggja eitt hús til HARRANS Guðs Ísraels.

7 Og Dávid segði til Sálomons, Sonur mín, hvat mær viðvíkur, tað var í huga mínum at byggja eitt hús at navni HARRANS Guðs míns:

8 Men orð HARRANS kom til mín, sigandi, Tú hevurt úthelt blóð ríkiligani, og hevurt gjørt mikil kríggj: tú skalt ikki byggja eitt hús at navni mínum, av tí at tú hevurt úthelt nógv blóð uppá jørðina í eygsjón míni.

9 Sí, ein sonur skal verða føddur til tín, hvør vera skal ein hvíldar maður; og eg vil geva honum hvíld frá øllum hansara fíggindum runt umkring: tí at navn hansara skal vera Sálomon, og eg vil geva frið og kvirru at Ísrael í døgum hans.

10 Hann skal byggja eitt hús til navn mítt; og hann skal vera sonur mín, og eg *vil vera* faðir hansara; og eg vil staðfesta hásæti kongadømis hans yvir Ísrael um ævir.

11 Nú, sonur mín, HARRIN veri við tær; og framgakk tú, og bygg hús HARRANS Guðs tíns, eins og hann hevur sagt um teg.

12 Einans HARRIN gevi tær vísdóm og skil, og gevi tær álegging viðvíkjandi Ísrael, at tú mást halda lóg HARRANS Guðs tíns.

13 Tá skalt tú framganga, um tú gevurt gætur eftir at uppfylla

ásetingarnar og dómarnar, sum HARRIN álegði Mósesi við viðvíkjandi Ísrael: ver sterkur, og av góðum móti; ønskrast ikki, ella ver mótfallin.

14 Nú, sí, í míni kvøl havi eg fyribúgvið til hús HARRANS eitt hundrað túsund talentir av gulli, og eitt túsund túsund talentir av silvuri; og av messing og jarni uttan vekt; tí at tað er í rikiligleika: timbur eisini og stein havi eg fyribúgvið; og tú kanst leggja afturat hartil.

15 Harafturat, *tað eru* verkamenn hjá tær í rikiligleika, høggarar og virkarar av steini og timbri, og alt háttarlag av hegnigum monnum til hvørt háttarlag av arbeiði,

16 Á gullinum, silvurinum, og messinginum, og jarninum, *er* einkið tal. Reis *teg tí,* og ver gerandi, og HARRIN veri við tær.

17 ¶ Dávid eisini skipaði øllum prinsunum av Ísrael at hjálpa Sálomoni, syni sínum, *sigandi,*

18 *Er* ikki HARRIN Guð tykkara við tykkum? og hevur hann *ikki* givið tykkum hvíld á hvørjari síðu? tí hann hevur givið íbúgvar landsins inn í hond mína; og landið er undirlagt frammi fyri HARRANUM, og frammi fyri fólki hansara.

19 Nú, setið tykkara hjarta og tykkara sál til at søkja HARRAN Guð tykkara; reisist tessvegna, og byggið tit halgidóm HARRANS Guðs, til *tess* at føra ørk sáttmála HARRANS, og hini heilagu reiðir Guðs, inn í húsið sum eigur at verða bygt til navns HARRANS.

KAPITUL 23

SO tá ið Dávid var gamalur og fullur av døgum, gjørdi hann Sálomon, son sín, *til* kong yvir Ísrael.

2 ¶ Og hann savnaði saman allar prinsarnar av Ísrael, við prestunum og Levitunum.

3 Nú, Levitarnir vórðu upptaldir frá tríati ára aldri og uppeftir: og teirra tal eftir teirra skallum, mann eftir mann, var tríati og átta túsund.

4 Av hvørjum tjúgu og fýra túsund *vóru* til *tess* at seta frameftir arbeiðið av HARRANS húsi; og seks túsund *vóru* yvirmenn og dómarar:

5 Harafturat *vóru* fýra túsund duravørðir; og fýra túsund prísaðu HARRANUM við teimum ljóðførunum sum eg gjørdi, *segði Dávid,* at prísa *harvið.*

6 Og Dávid deildi teir í skiftir millum synir Levīs, *nevniliga,* Gĕr´-sjŏn, Kō´-hăth, og Mĕ-râr´-ī.

7 ¶ Av Gĕr-sjŏn-ĭt´-unum *vóru* Lá´-ă-dăn, og Sjĭm´-ĕ-ī.

8 Synirnir hjá Lá´-ă-dăn-i; hin fremsti *var* Jē´-hĭ-ĕl, og Zē´-thăm, og Jó´-ĕl, tríggir.

9 Synirnir hjá Sjĭm´-ĕ-ī; Sjĕ-lō´-mĭth, og Há´-zī-ĕl, og Hár´-ăn, tríggir. Hesir *vóru* teir fremstu av fedrum Lá´-ă-dăn-s.

10 Og synirnir hjá Sjĭm´-ĕ-ī *vóru* Já´-hăth, Zĭ´-nă, og Jē´-ûsj, og Bē-rĭ´-ăh. Hesir fýra *vóru* synir Sjĭm´-ĕ-ī-s.

11 Og Já´-hăth var hin fremsti, og Zĭ´-zăh hin annar: men Jē´-ûsj og Bē-rĭ´-ăh høvdu ikki mangar synir; tessvegna vóru teir í ẽinari *upp*rokning, samsvarandi við hús faðirs *síns.*

12 ¶ Synirnir hjá Kō´-hăth-i; Amram, Ĭz´-hâr, Hē´-brŏn, og Ûz´-zī-ĕl, fýra.

13 Synirnir hjá Amrami; Aaron og Móses: og Aaron var atskildur, at hann skuldi halga hinar mest heilagu lutir, hann og synir hans um ævir, at brenna roykilsi frammi fyri HARRANUM, at tæna at honum, og at vælsigna í navni hans um ævir.

14 Nú, *viðvíkjandi* Guðs manninum Mósesi, hansara synir vórðu nevndir til ættargrein Levīs.

15 Synirnir hjá Mósesi *vóru* Gĕr´-sjŏm, og Êl-ĭ-ē´-zĕr.
16 Av sonunum hjá Gĕr´-sjŏm-i, Sjē´-bû-ĕl *var* hin fremsti.
17 Og synirnir hjá Êl-ĭ-ē´-zĕr-i *vóru*, Rē-hă-bĭ´-ăh hin fremsti. Og Êl-ĭ-ē´-zĕr hevði ongar aðrar synir; men synirnir hjá Rē-hă-bĭ´-ăh vóru sera mangir.
18 Av sonunum hjá Ĭz´-hâr-i; Sjē-lŏ´-mĭth hin fremsti.
19 Av sonunum hjá Hē´-brŏn-i; Jē-rĭ´-ăh hin fyrsti, Â-măr´-jăh hin annar, Jă-há´-zĭ-ĕl hin triðji, og Jē-kăm´-ē-ăm hin fjórði.
20 Av sonum Ŭz´-zĭ-ĕl-s; Mĭ´-chăh hin fyrsti, og Jē-sĭ´-ăh hin annar.
21 ¶ Synirnir hjá Mē-râr´-ĭ; Mâh´-lĭ, og Mū´-sjĭ. Synirnir hjá Mâh´-lĭ; Ēl-ē-ā´-zâr, og Kisj.
22 Og Ēl-ē-ā´-zâr doyði, og hevði ongar synir, men døtur: og teirra brøður, synir Kisj, tóku tær.
23 Synirnir hjá Mū´-sjĭ; Mâh´-lĭ, og Ē´-dĕr, og Jĕr´-ē-mŏth, tríggir.
24 ¶ Hesir *vóru* synirnir hjá Levĭ eftir húsi fedra teirra; *enntá* hinir fremstu av fedrunum, sum teir vórðu taldir eftir tali á nøvnum eftir skallum sínum, sum gjørdu arbeiðið fyri tænastuna av HARRANS húsi, frá tjúgu ára aldri og uppeftir.
25 Tí at Dávid segði, HARRIN Guð Ísraels hevur givið fólki sínum hvílu, at teir mega dvøljast í Jerusalem um ævir:
26 Og eisini Levitunum; teir skulu ei *meira* bera tabernaklið, ella nøkur reiðir hjá tí til tænastu tess.
27 Tí eftir hinum síðstu orðum Dávids *vórðu* Levitarnir upptaldir frá tjúgu ára gomlum og omanfyri:
28 Av tí at embætið hjá teimum *var* at varta um synir Aarons fyri tænastuna av HARRANS húsi, í forgørðunum, og í kømrunum, og í skírganini av øllum heilagum lutum, og arbeiðið av tænastu húsar Guðs;
29 Bæði til sýnisbreyðið, og til tað fína mjølið til matofring, og til tær ósúrgaðu køkurnar, og til *tað sum verður bakað í* pannuni, og til tað sum verður steikt, og til alt háttarlag av máti og stødd;
30 Og at standa hvønn morgun at takka og prísa HARRANUM, og líkaleiðis um aftan;
31 Og at ofra øll brenni-sláturoffur at HARRANUM á sabbatunum, á nýmánunum, og á teimum ásettu hátíðunum, eftir tali, samsvarandi við skipanina teimum áboðin, áframhaldandi frammi fyri HARRANUM:
32 Og at teir skuldu halda áleggingina av samkomu-tabernaklinum, og áleggingina av tí heilaga *plássinum*, og áleggingina hjá sonum Aarons, brøðrum sínum, í tænastuni av HARRANS húsi.

KAPITUL 24

NÚ, *hetta eru* deildirnar hjá sonum Aarons. Synirnir hjá Aaroni; Nádab, og Ā´-bĭ-hû, Ēl-ē-ā´-zâr, og Ĭth´-ă-mâr.
2 Men Nádab og Ā´-bĭ-hû doyðu áðrenn faðir sín, og høvdu eingi børn: tí útintu Ēl-ē-ā´-zâr og Ĭth´-ă-mâr prests-embætið.
3 Og Dávid skifti teir *sundur*, bæði Zā´-dŏk av sonum Ēl-ē-ā´-zâr-s, og Â-hĭm´-ē-lĕch av sonum Ĭth´-ă-mâr-s, samsvarandi við embætini hjá teimum í tænastuni hjá teimum.
4 Og tað vórðu fleiri fremstir menn funnir av sonunum hjá Ēl-ē-ā´-zâr-i enn av sonunum hjá Ĭth´-ă-mâr-i; og *svá* vórðu teir deildir sundur. Millum synir Ēl-ē-ā´-zâr-s *vóru tað* sekstan fremstir menn av húsi fedra *teirra*, og átta millum synir Ĭth´-ă-mâr-s, samsvarandi við hús fedra teirra.

5 Svá vórðu teir deildir sundur eftir luti, ēitt slag við øðrum; tí at stjórnarar halgidómsins, og stjórnar *húsar* Guðs, vóru av sonum Ēl-ē-ā´-zâr-s, og av sonum Ith´-ă-mâr-s.

6 Og Sjĕm-aī´-ăh Nĕth-á´-nēel-s sonur, skrivarin, *ēin* av Levitunum, skrivaði teir frammi fyri kongi, og prinsunum, og Zā´dōk presti, og Ă-hĭm´-ē-lēch Ā´-bī-âthâr-s syni, og *frammi fyri* teimum fremstu av fedrum prestanna og Levitanna: ēitt høvuðs húski verðandi tikið til Ēl-ē-ā´-zâr-s, og *ēitt* tikið til Ith´-ă-mâr-s.

7 Nú, hin fyrsti luturin kom fram til Jē-hoī´-ă-rīb-s, hin annar til Jē-daī´-ăh,

8 Hin triðji til Hár´-ĭm-s, hin fjórði til Sê-ôr´-ĭm-s,

9 Hin fimti til Măl-chī´-jăh, hin sætti til Mī´-jă-mīn-s,

10 Hin sjeyndi til Hăk´-kōz-ar, hin áttandi til Á´-bī-jăh,

11 Hin níggjundi til Jē´-sjû-ă, hin tíggjundi til Sjĕc-ăn´-jăh,

12 Hin ellivti til Ē´-lī-ăsj-īb-s, hin tólvti til Jákims,

13 Hin trettandi til Hŭp´-păh, hin fjúrtandi til Jē-sjĕb´-ē-ăb-s,

14 Hin fimtandi til Bĭl´-găh, hin sekstandi til Ĭm´-mĕr-s,

15 Hin seytjandi til Hē´-zîr-s, hin átjandi til Aph´-sēs-ar,

16 Hin nítjandi til Pĕth-ă-hī´-ăh, hin tjúgundi til Jē-hêz´-ēk-ēl-s,

17 Hin ēin og tjúgundi til Já´-chĭn-s, hin tvey og tjúgundi til Găm´-ûl-s,

18 Hin trý og tjúgundi til Dĕl-aī´-ăh, hin fýra og tjúgundi til Mā-ă-zī´-ăh.

19 Hetta *vóru* skipingarnar av teimum í teirra tænastu at koma inn í hús HARRANS, samsvarandi við teirra háttarlag, undir Aaroni, faðir sínum, eins og HARRIN Guð Ísraels hevði boðið honum.

20 ¶ Og restin av sonum Levīs *vóru hesir:* Av sonum Amrams; Sjū´-bă-ĕl: av sonum Sjū´-bă-ĕl-s; Jĕh-deī´-ăh.

21 Viðvíkjandi Rê-hă-bī´-ăh: av sonum Rê-hă-bī´-ăh, hin fyrsti *var* Ĭs-sjī´-ăh.

22 Av Ĭz-hăr-ĭt´-unum; Sjē´-lô-mōth: av sonum Sjē´-lô-mōth-s; Já´-hăth.

23 Og synir *Hē´-brŏn-s;* Jē-rī´-ăh *hin fyrsti,* Ă-măr´-jăh hin annar, Jă-hă´-zī-ēl hin triðji, Jē-kăm´-ē-ăm hin fjórði.

24 *Av* sonum Ŭz´-zī-ĕl-s; Mī´-chăh: av sonum Mī´-chăh; Sjá´-mîr.

25 Bróðir Mī´-chăh *var* Ĭs-sjī´-ăh: av sonum Ĭs-sjī´-ăh; Zĕch-ăr´-jăh.

26 Synirnir hjá Mĕ-râr´-ī *vóru* Măh´-lī og Mū´-sjī: synirnir hjá Já-ă-zī´-ăh; Bē´-nō.

27 ¶ Synirnir hjá Mĕ-râr´-ī av Já-ă-zī´-ăh; Bē´-nō, og Sjō´-hăm, og Zăc´-cûr, og Ĭb´-rī.

28 Av Măh´-lī *kom* Ēl-ē-ā´-zâr, hvør ongar synir hevði.

29 Viðvíkjandi Kisj-i: sonurin hjá Kisj *var* Jē-ráh´-mēel.

30 Synirnir eisini hjá Mū´-sjī; Măh´-lī, og Ē´-dĕr, og Jĕr´-ĭ-mōth. Hesir *vóru* synirnir hjá Levitunum eftir húsi fedra teirra.

31 Hesir líkaleiðis kastaðu lutir yvir av brøðrum sínum, sonum Aarons, í nærveru Dávids kongs, og Zā´-dōk-s, og Ă-hĭm´-ē-lĕch-s, og hinna fremstu av fedrum prestanna og Levitanna, enntá høvuðs fedrarnir yvir av yngru brøðrum sínum.

KAPITUL 25

HARAFTURAT atskildu Dávid og høvuðsmenninir av herliðinum til tænastuna hjá sonum Á´-săph-s, og Hē´-măn-s, og Jē´-dū-thûn-s, sum skuldu prophetera við hørpum, við psøltrum, og við glymskálum: og talið á verkamonnunum samsvarandi við tænastu teirra var:

2 Av sonum Á́-săph-s; Zăć-cûr, og Jóseph, og Nĕ-thăń-jăh, og Ás-ă-rĕ́-lăh, synirnir hjá Á́-săph-i undir hondum Á́-săph-s, sum propheteraðu samsvarandi við skipan kongsins.

3 Av Jĕ́-dû-thûn-i: synirnir hjá Jĕ́-dû-thûn-i; Gĕ-dăĺ-jăh, og Zĕ́-rī, og Jĕ-sjấ-ăh, Hăsj-ă-bī́-ăh, og Măt-tī-thī́-ăh, seks, undir hondum faðirs teirra Jĕ́-dû-thûn-s, hvørjir propheteraðu við eini hørpu, til *tess* at veita tøkkir og at prísa HARRANUM.

4 Av Hḗ-măn-i: synirnir hjá Hḗ-măn-i; Bŭk-kī́-ăh, Măt-tă-nī́-ăh, Ūź-zĭ-ĕl, Sjĕ́-bû-ĕl, og Jĕŕ-ī-mōth, Hă-năń-jăh, Hă-nā́-nī, Ē-lī́-ă-thăh, Gĭd-dăĺ-tī, og Rô-măḿ-tî-ḗ-zĕr, Jōsj-bĕ-kăsj́-ăh, Măl-lṓ-thī, Hṓ-thîr, *og* Mă-hā́-zĭ-ōth:

5 Allir hesir *vóru* synirnir hjá Hḗ-măn-i, síggjara kongs í orðum Guðs, til at lyfta upp hornið. Og Guð gav til Hḗ-măn-s fjúrtan synir og tríggjar døtur.

6 Allir hesir *vóru* undir hondum faðirs teirra til sang *í* húsi HARRANS, við glymskálum, psøltrum, og hørpum, til tænastu húsar Guðs, samsvarandi við skipan kongs til Á́-săph-s, Jĕ́-dû-thûn-s, og Hḗ-măn-s.

7 So talið á teimum, við teirra brøðrum sum vóru undirvístir í sangum HARRANS, *enntá* allir sum vóru hegnigir, var tvey hundrað *og* fýrsinstjúgu og átta.

8 ¶ Og teir kastaðu lutir, vørður ímóti *vørði,* eins væl hin lítli sum hin mikli, lærarin sum næmingurin.

9 Nú, hin fyrsti luturin kom fram fyri Á́-săph til Józephs: hin annar til Gĕ-dăĺ-jăh; hvørjir, við sínum brøðrum og sonum, *vóru* tólv:

10 Hin triðji til Zăć-cûr-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

11 Hin fjórði til Ĭź-rī-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

12 Hin fimti til Nĕ-thăń-jăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

13 Hin sætti til Bŭk-kī́-ăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

14 Hin sjeyndi til Jĕsj-ă-rĕ́-lăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

15 Hin áttandi til Jĕ-sjấ-ăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

16 Hin níggjundi til Măt-tă-nī́-ăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

17 Hin tíggjundi til Sjĭḿ-ĕ-ī-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

18 Hin ellivti til Â-zá́-rĕel-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

19 Hin tólvti til Hăsj-ă-bī́-ăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

20 Hin trettandi til Sjū́-bă-ĕl-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

21 Hin fjúrtandi til Măt-tĭ-thī́-ăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

22 Hin fimtandi til Jĕŕ-ĕ-mōth-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

23 Hin sekstandi til Hă-năń-jăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

24 Hin seytjandi til Jōsj-bĕ-kăsj́-ăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

25 Hin átjandi til Hă-nā́-nī-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

26 Hin nítjandi til Măl-lṓ-thī-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

27 Hin tjúgundi til Ē-lī́-ă-thăh, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

28 Hin ēin og tjúgundi til

Hŏ´-thîr-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

29 Hin tvey og tjúgundi til Gĭd-dăl´-tī-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

30 Hin trý og tjúgundi til Măhā´-zī-ōth-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv:

31 Hin fýra og tjúgundi til Rô-măm´-tî-ē´-zĕr-s, *hann,* synir hansara, og brøður hansara, *vóru* tólv.

KAPITUL 26

VIÐVÍKJANDI deildunum hjá duravørðunum: Av Kôrhĭt´-unum *var* Mĕ-sjĕl-ē-mī´-âh Kōr´-ê sonur, av sonum Á´-săph-s.

2 Og synirnir hjá Mĕ-sjĕl-ē-mī´-âh *vóru,* Zĕch-ăr´-jăh hin fyrstiføddi, Jĕd-ī-á´-ĕl hin annar, Zĕbă-dī´-ăh hin triðji, Jăth´-nī-ĕl hin fjórði,

3 Ē´-lăm hin fimti, Jĕ-hó´-hănăn hin sætti, Ē-lī-ō´-ē-naî hin sjeyndi.

4 Harafturat *vóru* synirnir hjá Ō´-bĕd-ē´-dóm-i, Sjĕm-aî´-ăh hin fyrstiføddi, Jĕ-hō´-zăbăd hin annar, Jó´-âh hin triðji, og Sá´-câr hin fjórði, og Nĕth-á´-nēĕl hin fimti,

5 Ăm´-mī-ĕl hin sætti, Ĭs´-săchâr hin sjeyndi, Pê-ŭl´-thaî hin áttandi: tí Guð vælsignaði hann.

6 Eisini innat Sjĕm-aî´-ăh, syni hansara, vórðu synir føddir, sum ríktu út gjøgnum hús faðirs teirra: tí at teir *vóru* mektigir reystsemis menn.

7 Synirnir hjá Sjĕm-aî´-ăh; Ŏth´-nī, og Rĕph´-ă-ĕl, og Ō´-bĕd, Ēl-zā´-băd, hvørs brøður *vóru* sterkir menn, Ē´-lī-hū, og Sĕm-a-chī´-ăh.

8 Allir hesir av sonum Ō´-bĕd-ē´-dóm-s: teir og synir teirra og brøður teirra, førir menn til styrki til tænastuna, *vóru* trísinstjúgu og tveir av Ō´-bĕd-ē´-dóm-i.

9 Og Mĕ-sjĕl-ē-mī´-âh hevði synir og brøður, sterkar menn, átjan.

10 Eisini Hó´-săh, av børnum Mĕ-râr´-ī-s, hevði synir; Simrī hin fremsti, (tí at *hóast* hann var ikki hin fyrstiføddi, gjørdi faðir hansara hann tó hin fremsta;)

11 Hĭl´-kī-ăh hin annar, Tĕb-âlī´-ăh hin triðji, Zĕch-ăr´-jăh hin fjórði: allir synir og brøður Hó´-săh *vóru* trettan.

12 Hesa millum *vóru* deildirnar hjá duravørðunum, *enntá* millum hinna fremstu manna, *havandi* vaktir hvør ímóti øðrum, til at tæna í húsi HARRANS.

13 ¶ Og teir kastaðu lutir, eins væl hin lítli sum hin mikli, samsvarandi við hús fedra sína, fyri hvørt portrið.

14 Og luturin eystureftir fell til Sjĕl-ē-mī´-ăh. Síðan fyri Zĕchăr´-jăh, son hansara, ein vísan ráðgeva, kastaðu teir lutir; og hansara lutur kom út norðureftir.

15 Til Ō´-bĕd-ē´-dóm-s suðureftir; og til sona hansara, hús Ăsŭp´-pĭm-s.

16 Til Sjŭp´-pĭm-s og Hó´-săh *kom luturin fram* vestureftir, hjá" portrinum Sjăl´-lĕ-chĕth, við landsveg niðanfaringarinnar, vakt ímóti vakt.

17 Eystureftir *vóru* seks Levitar, norðureftir fýra um dagin, suðureftir fýra um dagin, og mótvegis Ă-sŭp´-pĭm tveir *og* tveir.

18 Við Pâr´-bâr vestureftir, fýra við landsvegin, *og* tveir við Pâr´-bâr.

19 Hetta *eru* deildirnar hjá duravørðunum millum synir Kōr´-ê-s, og millum synir Mĕ-râr´-ī-s.

20 ¶ Og av Levitunum, Á´-hījăh *var* yvir dýrgripunum av húsi Guðs, og yvir dýrgripunum av teimum vígdu tingunum.

21 *Hvat* sonunum hjá Lá´-ădăn-i *viðvíkur;* sonunum hjá Gĕrsjŏn-ĭt´-anum Lá´-ă-dăn-i, fremstum fedrum, *enntá* hjá Lá´-ă-dăn-i Gĕr-sjŏn-ĭt´-a, *vóru* Jĕ-hī-ē´-lī.

22 Synirnir hjá Jĕ-hĭ-ē´-lī; Zē´-thăm; og Jó´-ĕl, bróðir hansara; *sum vóru* yvir dýrgripunum av HARRANS húsi.

23 Um Amramitarnar, *og* Ĭz-hăr-ĭt´-arnar, Hê-brŏn-ĭt´-arnar, *og* Ŭz-zĭ-ē-lĭt´-arnar:

24 Og Sjē´-bû-ĕl Gĕr´-sjŏm-s sonur, Móse sonar, *var* stjórnari av dýrgripunum.

25 Og hansara brøður av Êl-ĭ-ē´-zĕr-i; Rê-hă-bī´-ăh sonur hansara, og Jĕ-sjā´-ăh sonur hansara, og Jóram sonur hansara, og Zĭch´-rī sonur hansara, og Sjĕ-lŏ´-mĭth sonur hansara.

26 Hvør Sjĕ-lŏ´-mĭth og hansara brøður *vóru* yvir øllum dýrgripunum av teimum vígdu tingunum, hvørji Dávid kongur, og teir fremstu fedrarnir, høvuðsmenninir yvir túsundum og hundraðum, og høvuðsmenn herliðsins, høvdu vígt.

27 Burtur úr fongunum, vunnum í bardøgum, vígdu teir til at viðlíkahalda hús HARRANS.

28 Og alt sum Sámuel síggjari, og Saul Kisj sonur, og Abner Nêrs sonur, og Jó´-ăb Zĕr-ū´-jŭh sonur, høvdu vígt; *og* hvørsumhelst *ið* hevði vígt *nakað ting, tað var* undir hendi Sjĕ-lŏ´-mĭth-s, og brøðra hans.

29 ¶ Um Ĭz-hăr-ĭt´-arnar, Chĕn-ă-nī´-ăh og synir hansara *vóru* til útvortis gerningin yvir Ísrael, til yvirmenn og dómarar.

30 *Og* um Hê-brŏn-ĭt´-arnar, Hăsj-ă-bī´-ăh og brøður hansara, reystsemis menn, eitt túsund og sjey hundrað, *vóru* yvirmenn teirra millum av Ísrael, hesumegin Jordan vestureftir í øllum gerningi HARRANS, og í tænastu kongs.

31 Hê-brŏn-ĭt´-anna millum *var* Jĕ-rī´-ăh hin fremsti, *enntá* Hê-brŏn-ĭt´-anna millum, samsvarandi við ættir fedra hans. Í hinum fjørutiunda ári av ríkjan Dávids vórðu teir søktir eftir, og tað vórðu funnir teirra millum mektigir reystsemis menn í Já´-zĕr Gileads.

32 Og hansara brøður, reystsemis menn, *vóru* tvey túsund og sjey hundrað fremstir fedrar, hvørjar Dávid kongur gjørdi *til* stjórnarar yvir Reûbenitunum, Gáditunum, og hálvu ættargrein Mă-năs´-sēh, fyri hvørt mál hoyrandi til Guðs, og mál˙ hjá kongi.

KAPITUL 27

NÚ, Ísraels børn eftir teirra tali, *tað vil siga,* teir fremstu fedrarnir og høvuðsmenn*inir* av túsundum og hundraðum, og teirra yvirmenn sum tæntu kongi í nøkrum máli hjá skiftunum, sum komu inn og fóru út mánað eftir mánað út gjøgnum allar mánaðir ársins, av hvørjum skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

2 Yvir tí fyrsta skiftinum fyri hin fyrsta mánaðin *var* Jă-sjŏb´-ĕ-ăm Zăb´-dĭ-ĕl-s sonur: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

3 Av børnum Pē´-rĕz-ar *var* hin fremsti av øllum høvuðsmonnunum av herliðinum fyri hin fyrsta mánaðin.

4 Og yvir skiftinum av hinum øðrum mánaðinum *var* Dŏ´-dāī, ein Ă-hô-hĭt´-i, og av hansara skifti *var* Mĭk´-lōth eisini stjórnarin: í hansara skifti somuleiðis *vóru* tjúgu og fýra túsund.

5 Hin triðji høvuðsmaðurin av herliðinum fyri hin triðja mánaðin *var* Bĕ-nā´-ăh Jĕ-hŏi´-ă-dă sonur, ein fremstur prestur: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

6 Hetta *er tann* Bĕ-nā´-ăh, *sum var* mektigur *millum* hinna tríati, og omanfyri teimum tríati: og í hansara skifti *var* Ăm-mī´-zăb-băd, sonur hansara.

7 Hin fjórði *høvuðsmaðurin* fyri hin fjórða mánaðin *var* Ás´-ă-hĕl,

bróðir Jó′-ăb-s, og Zĕb-ă-dī′-ăh, sonur hansara, eftir hann: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

8 Hin fimti høvuðsmaðurin fyri hin fimta mánaðin *var* Sjăm′-hŭth Ĭz-ră-hĭt′-i: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

9 Hin sætti *høvuðsmaðurin* fyri hin sætta mánaðin *var* Ĭ′-ră Ĭk′-kēsj sonur Tĕ-kô-ĭt′-i: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

10 Hin sjeyndi *høvuðsmaðurin* fyri hin sjeynda mánaðin *var* Hē′-lēz Pê-lô-nĭt′-i, av børnum Ē′-phră-ĭm-s: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

11 Hin áttandi *høvuðsmaðurin* fyri hin áttanda mánaðin *var* Sĭb′-bē-caî Hû-sjă-thĭt′-i, av Zâr-hĭt′-unum: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

12 Hin níggjundi *høvuðsmaðurin* fyri hin níggjunda mánaðin *var* Ă-bī-ē′-zĕr An-ĕ-tô-thĭt′-i, av Benjamitunum: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

13 Hin tíggjundi *høvuðsmaðurin* fyri hin tíggjunda mánaðin *var* Má′-hă-raî Nē-tôph-â-thĭt′-i, av Zâr-hĭt′-unum: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

14 Hin ellivti *høvuðsmaðurin* fyri hin ellivta mánaðin *var* Bĕ-naî′-ăh Pi-râ-thŏn-ĭt′-i, av børnum Ē′-phră-ĭm-s: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

15 Hin tólvti *høvuðsmaðurin* fyri hin tólvta mánaðin *var* Hĕl′-daî Nē-tôph-â-thĭt′-i, av Ōth′-nĭ-ĕl-i: og í hansara skifti *vóru* tjúgu og fýra túsund.

16 ¶ Harafturat yvir ættargreinum Ísraels: stjórnarin av Reūbenitunum *var* Ĕl-ĭ-ē′-zĕr Zĭch′-rī-s sonur: av Símeonitunum, Sjĕph-ăt′-jăh Mā′-ă-châh sonur:

17 Av Levitunum, Hăsj-ă-bī′-ăh Kē′-mû-ĕl-s sonur: av Aaronitunum, Zā′-dŏk:

18 Av Judah, Ē′-lĭ-hū, *ēin* av brøðrum Dávids: av Ĭs′-să-chăr, Omrī Michaels sonur:

19 Av Zē′-bŭ-lŏn, Ĭsj-maî′-ăh Ó-bă-dī′-ăh sonur: av Năph′-tâ-lī, Jĕr′-ĭ-mōth Ăz′-rī-ĕl-s sonur:

20 Av børnum Ē′-phră-ĭm-s, Hó-sjē′-ă Âz-ă-zī′-ăh sonur: av hálvu ættargrein Mă-năs′-sēh, Jó′-ĕl Pē-daî′-ăh sonur:

21 Av hálvu *ættargrein* Mă-năs′-sēh í Gilead, Ĭd′-dō Zĕch-ăr′-jăh sonur: av Benjamin, Já-ăs′-ĭ-ĕl Abners sonur:

22 Av Dán, Â-zá′-rēēl Jē-ró′-hăm-s sonur. Hesir *vóru* prinsarnir av ættargreinum Ísraels.

23 ¶ Men Dávid tók ikki talið á teimum frá tjúgu ára gomlum og undir: av tí at HARRIN hevði sagt, *at* hann vildi økja um Ísrael líkt við stjørnur himnanna.

24 Jó′-ăb Zĕr-ū′-jŭh sonur byrjaði at telja upp, men hann fullførdi ikki, av tí at tað fell vreiði fyri tað ímóti Ísrael; eiheldur varð talið koyrt í frásøgn krýnikna Dávids kongs.

25 ¶ Og yvir dýrgripum kongs *var* Ăz-má′-vēth Ad′-ĭ-ĕl-s sonur: og yvir goymsluhúsunum í akrunum, í staðunum, og í bygdunum, og í slottunum, *var* Jē-hó′-nă-thăn Ŭz′-zī-ăh sonur:

26 Og yvir teimum, sum gjørdu arbeiði akursins til velting av lendinum, *var* Ēz′-rī Chē′-lŭb-s sonur:

27 Og yvir víngørðunum *var* Sjĭm′-ē-ī Rā-mă-thĭt′-i: yvir grøði víngarðanna til vínkjallararnar *var* Zăb′-dī Sjīph-mīt′-i:

28 Og yvir olivintrøunum og morberjatrøunum, sum *vóru* í teimum lágu slættunum, *var* Bā′-ăl-há′-năn Gê-dē-rĭt′-i: og yvir oljukjallarunum *var* Jó′-ăsj:

29 Og yvir stórfæafylgjunum, sum beittu í Sjâr′-ŏn, *var* Sjĭt-rā′-ī Sjâr-ŏn-ĭt′-i: og yvir stórfæafylgjunum, *sum vóru* í dølunum, *var* Sjá′-phăt Ad-lā′-ī-s sonur:

30 Yvir kamelunum eisini *var* Ō´-bïl Ísj-mâ-ĕl-ït´-i: og yvir asnunum *var* Jĕh-dej´-ăh Mĕ-rō-nō-thït´-i:

31 Og yvir smáfæafylgjunum *var* Já´-zīz Hâ-gē-rīt´-i. Allir hesir *vóru* stjórnarar *figgjar*evnisins, sum *var* kong Dávids.

32 Eisini Jónathan, faðirbróðir Dávids, var ein ráðgevari, ein vísmaður, og ein skrivari: og Jē´-hï-ĕl Hăch-mō´-nï-s sonur *var* hjá sonum kongsins:

33 Og Ă-hïth´-ō-phĕl *var* ráðgevi kongsins: og Hū´-sjâi Âr-chït´-i *var* lagsbróðir kongsins:

34 Og eftir Ă-hïth´-ō-phĕl *var* Jē-hōi´-ă-dă Bĕ-nâi´-ăh sonur, og Ā´-bï-ă-thâr: og herovastin av heri kongsins *var* Jó´-ăb.

KAPITUL 28

OG Dávid savnaði allar prinsarnar av Ísrael saman, prinsarnar av ættargreinunum, og høvuðsmenninar av flokkunum sum tæntu fyri kongi eftir skifti, og høvuðsmenninar yvir túsundunum, og høvuðsmenn yvir hundraðunum, og bústjórarnar yvir øllum *figgjar*evninum og ognini hjá kongi, og hjá sonum hansara, við yvirmonnunum, og við teimum mektigu monnunum, og við øllum teimum reystu monnunum, at Jerusalem.

2 Tá stóð Dávid kongur upp uppá føtur sínar, og segði, Hoyrið meg, brøður mínir, og fólk mítt: *Hvat meg varðar,* eg *hevði* í hjarta mínum at byggja eitt hvíldarhús til ørk sáttmála HARRANS, og til fótskammul Guðs várs, og hevði gjørt tilreiðar til byggingina:

3 Men Guð segði við meg, Tú skalt ikki byggja eitt hús til navn mítt, av tí at tú *hevurt verið* ein krígsmaður, og hevurt helt blóð.

4 Hvussu enn er, HARRIN Guð Ísraels valdi meg frammi fyri øllum húsi faðirs míns til at vera kong yvir Ísrael um ævir: tí hann hevur valt Judah *til at vera* stjórnaran; og av húsi Judah, húsi faðirs míns; og millum synir faðirs míns líkaði honum meg at gera *meg til* kong yvir øllum Ísrael:

5 Og av øllum sonum mínum, (tí at HARRIN hevur givið mær mangar synir,) hevur hann valt Sálomon, son mín, at sita uppiá hásæti kongadømis HARRANS yvir Ísrael.

6 Og hann segði við meg, Sálomon, sonur tín, hann skal byggja hús mítt og forgarðar mínar: tí at eg havi valt hann *til at vera* sonur mín, og eg vil vera faðir hansara.

7 Harafturat vil eg grundfesta kongadømi hans um ævir, um hann verði støðugur at gera boð míni og dómar mínar, sum á hesum degi.

8 Nú tessvegna, í eygsjónini á øllum Ísrael – samkomu HARRANS, og í áhoyrn Guðs várs, haldið og søkið eftir øllum boðum HARRANS Guðs tykkara: at tit mega ognarhalda hetta góða land, og eftirlata *tað* til arvs til barna tykkara eftir tykkum um ævir.

9 ¶ Og tú, Sálomon, sonur mín, kenn tú Guð faðirs tíns, og tæn honum við einum fullkomnum hjarta og við einum viljugum huga: tí at HARRIN rannsakar øll hjørtu, og skilur allar ímyndanir hugsananna: um tú søki hann, hann vil verða funnin av tær; men um tú yvirgevi hann, hann vil kasta teg av um ævir.

10 Ansa eftir nú; tí at HARRIN hevur valt teg til at byggja eitt hús til halgidómin: ver sterkur, og ger *tað.*

11 ¶ Tá gav Dávid til Sálomons, sonar síns, mynstrið av forhøllini, og av húsum hennara, og av dýrgripagoymslum hennara, og av ovaru kømrum hennara, og av innaru salum hennara, og av plássi náðistólsins,

12 Og mynstrið av øllum sum hann hevði við˚ andanum, av forgørðunum av HARRANS húsi, og av øllum kømrunum runt umkring, av dýrgripagoymslum húsar Guðs, og av dýrgripagoymslunum av teimum vígdu tingunum:
13 Eisini til skiftini hjá prestunum og Levitunum, og til alt arbeiðið av tænastuni av HARRANS húsi, og til øll tænastu-reiðini í HARRANS húsi.
14 *Hann gav* av gulli eftir vekt til *lutir* av gulli, til øll amboð av øllum háttarlagi av tænastu; *silvur eisini* til øll amboð av silvuri eftir vekt, til øll amboð av hvørjum slagi av tænastu:
15 Enntá vektina til ljósastakarnar av gulli, og til teirra lampur av gulli, eftir vekt til hvønn ljósastaka, og til lampurnar harav: og til ljósastakarnar av silvuri eftir vekt, *bæði* til ljósastakan, og *eisini* til lampurnar harav, samsvarandi við brúkið av hvørjum ljósastaka.
16 Og eftir vekt *gav hann* gull til sýnisbreyðs-borðini, til hvørt borðið; og *líkaleiðis* silvur til borðini av silvuri:
17 Eisini skírt gull til kjøtkrókarnar, og bollarnar, og bikørini: og til tey gyltu kørini *gav hann gull* eftir vekt til hvørt karið; og *somuleiðis silvur* eftir vekt til hvørt karið av silvuri:
18 Og til roykilsis-altarið, edlað gull eftir vekt; og gull til mynstrið av vagni ch̲êr-û-bīm´-anna, sum breiddu út *veingir sínar,* og dekkaðu ørk sáttmála HARRANS.
19 Alt *hetta, segði Dávid,* fekk HARRIN meg *at* skilja í skrift við˚ hond *síni* uppiá mær, *enntá* øll verkini av hesum mynstri.
20 Og Dávid segði til Sálomons, sonar síns, Ver sterkur og av góðum móti, og ger *tað:* óttast ikki, ella ver mótfallin: tí at HARRIN Guð, *enntá* Guð mín, *vil vera* við tær; hann vil ikki bila tær, ella fara frá tær, inntil tú hevurt fullført alt arbeiðið til tænastuna av HARRANS húsi.
21 Og sí, skiftini hjá prestunum og Levitunum, *enntá tey skulu vera við tær* til alla tænastu húsar Guðs: og *tað skal vera* við tær til alt háttarlag av handverki hvør viljugur, hegnigur maður, til hvørt háttarlag av tænastu: eisini prinsarnir og alt fólkið *vilja vera* heil*veg*is yvirfyri tíni ábjóðan.

KAPITUL 29

HARAFTURAT segði Dávid kongur við alla samkomuna, Sálomon, sonur mín, hvønn aleina Guð hevur valt, *er enn* ungur og bleytur, og arbeiðið *er* mikið: tí at slottið *er* ikki til mann, men til HARRAN Guð.
2 Nú, eg havi fyribúgvið við øllum mínum mátti til húsar Guðs míns gullið til *lutir at verða gjørdar* av gulli, og silvurið til *lutir* av silvuri, og messingin til *lutir* av messingi, jarnið til *lutir* av jarni, og við˚ til *lutir* av viði; ónyks steinar, og *steinar* at verða settir, skyggjandi steinar, og av ymsum litum, og alt háttarlag av dýrabærum steinum, og marmorsteinar í ovurnøgd.
3 Harafturat, av tí at eg havi sett mína yndan til húsar Guðs míns, havi eg av mínum egna ēinstaka góða, av gulli og silvuri, *sum* eg havi givið til húsar Guðs míns, yvir og uppum alt sum eg havi fyribúgvið fyri hitt heilaga hús,
4 *Enntá* trý túsund talentir av gulli, av gulli O´-ph̲īr-s, og sjey túsund talentir av edlaðum silvuri, til at yvirklæða veggirnar av húsunum *við:*
5 Gullið til *lutir* av gulli, og silvurið til *lutir* av silvuri, og til alt háttarlag av arbeiði *at verða gjørt* við˚ hondunum hjá listhondverk-

arum. Og hvør *tá* er viljugur til at víga sína tænastu henda dag at HARRANUM?

6 ¶ Tá ofraðu teir fremstu av fedrunum og prinsunum av ættargreinum Ísraels, og høvuðsmenninir av túsundum og av hundraðum, við stjórnarunum av arbeiði kongsins, viljugliga,

7 Og góvu til tænastu húsar Guðs av gulli fimm túsund talentir og tíggju túsund dárikar, og av silvuri tíggju túsund talentir, og av messing átjan túsund talentir, og eitt hundrað túsund talentir av jarni.

8 Og teir, hjá hvørjum *dýrabærir* steinar vórðu funnir, góvu *teir* til dýrgripagoymsluna av HARRANS húsi, við hendi Jē´-hĭ-ĕl-s Gĕr-sjŏn-ĭt´-a.

9 Tá fegnaðist fólkið, tí at tey ofraðu viljugliga, av tí at við fullkomnum hjarta tey ofraðu viljuga til HARRANS: og Dávid kongur eisini fegnaðist við miklari frøi.

10 ¶ Hvørsvegna Dávid vælsignaði HARRAN frammi fyri allari samkomuni: og Dávid segði, Vælsignaður *veri* tú, HARRI Guð Ísraels, faðirs okkara, um ævir og ævir.

11 Tín, O HARRI, *er* mikilleikin, og mátturin, og dýrdin, og sigurin, og hátignin: tí at alt, *sum er* í himninum og á jørðini, *er títt;* títt *er* kongadømið, O HARRI, og tú ert upphevjaður sum høvur uppiyvir øllum.

12 Bæði ríkdómar og heiður *koma* frá tær, og tú ríkirt yvir øllum; og í tíni hond *er* kraft og máttur; og í tíni hond *tað er* at gera miklan; og at geva styrki at øllum.

13 Nú tessvegna, Guð vár, vær tøkkum tær, og prísum dýrdsama navni tínum.

14 Men hvør *eri* eg, og hvat *er* fólk mítt, at vær skuldum verið førir fyri at ofrað so viljugliga eftir hesum slag? tí at allir lutir *koma* frá tær, og av tínum egna høvum vær givið tær.

15 Tí at vær *erum* fremmandir frammi fyri tær, og útisetar, eins og *vóru* allir fedrar várir: okkara dagar á jørðini *eru* sum ein skuggi, og *tað er* eingin verðandi.

16 O HARRI Guð vár, øll henda goymsla, sum vær høvum fyribúgvið til at byggja tær eitt hús til heilaga navn títt, *kemur* av hond tíni, og *er* øll tín egna.

17 Eg veit eisini, Guð mín, at tú roynirt hjartað, og hevurt tokka í reiðiligleika. Hvat mær viðvíkur, í reiðiligleika hjarta míns havi eg viljugani ofrað øll hesi ting: og nú havi eg sæð við frøi títt fólk, sum eru tilstaðar her, at ofra viljugani at tær.

18 O HARRI Guð Ábrahams, Ísaaks, og Ísraels, fedra vára, varðveit hetta um ævir í ímyndanini av hugsanunum av hjarta fólks tíns, og fyrireika teirra hjarta at tær:

19 Og gev Sálomoni, syni mínum, eitt fullkomið hjarta, at halda boð tíni, tínar vitnisburðir, og tínar ásetingar, og at gera øll *hesi ting*, og at byggja slottið, *fyri* hvørt eg havi gjørt útvegan.

20 ¶ Og Dávid segði til alrar samkomunnar, Nú vælsignið HARRAN Guð tykkara. Og øll samkoman vælsignaði HARRAN Guð fedra sína, og boygdu niður høvur síni, og tilbóðu HARRAN, og kongin.

21 Og teir sláturofraðu sláturoffur˘ at HARRANUM, og ofraðu brennioffur˘ at HARRANUM, á morgindeginum eftir tann dagin, *enntá* eitt túsund ungtarvar, eitt túsund veðrar, *og* eitt túsund lomb, við teirra drykkofrum, og sláturofrum í ríkiligleika fyri alt Ísrael:

22 Og ótu og drukku frammi fyri HARRANUM á tí degi við

miklari gleði. Og teir gjørdu Sálomon, son Dávids, *til* kong aðru ferðina, og salvaðu HARRANUM *hann til at vera* hin fremsti landsstjórin, og Zā´-dŏk *til at vera* prest.

23 Tá settist Sálomon á hásæti HARRANS sum kongur ístaðin fyri Dávid, faðir sín, og framgekk; og allur Ísrael lýddi hann.

24 Og allir prinsarnir, og teir mektigu menninir, og allir synirnir líkaleiðis hjá Dávidi kongi, undirgóvu seg sjálvar yvirfyri Sálomon kongi.

25 Og HARRIN stórgjørdi Sálomon ovurhondsligani í eygsjónini hjá øllum Ísrael, og læt út uppá hann *slíka* kongliga hátign, sum hevði ikki verið á nøkrum kongi undan honum í Ísrael.

26 ¶ Svá ríkti Dávid Ísai-s sonur yvir øllum Ísrael.

27 Og tíðin, sum hann ríkti yvir Ísrael, *var* fýrati ár; sjey ár ríkti hann í Hē´-brŏn, og tríati og trý *ár* ríkti hann í Jerusalem.

28 Og hann doyði í einum góðum gomlum aldri, fullur av døgum, ríkidømum, og heiðuri: og Sálomon, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

29 Nú, gerningar Dávids kongs, fyrstir og síðstir, sí, teir *eru* skrivaðir í bók Sámuels síggjara, og í bók Náthans prophets, og í bók Gáds síggjara,

30 Við allari hansara ríkjan og hansara mátti, og tíðunum sum fóru yvir hann, og yvir Ísrael, og yvir øll kongadømir landanna.

HIN SEINNA BÓK
KRÝNIKANNA.

KAPITUL 1

OG Sálomon Dávids sonur varð styrktur í kongadømi sínum, og HARRIN Guð hansara *var* við honum, og stórgjørdi hann ovurhondsliga.

2 Tá talaði Sálomon innat øllum Ísrael, til høvuðsmenninar hjá túsundum og hjá hundraðum, og til dómararnar, og til hvønn stjórnara í øllum Ísrael, hinar fremstu av fedrunum.

3 So Sálomon, og øll samkoman við honum, fóru til tað høga plássið sum *var* í Gibeon; tí at har var tabernakkul samkomu Guðs, hvørt Móses, tænari HARRANS, hevði gjørt í oyðuni.

4 Men ørk Guðs hevði Dávid ført upp frá Kĭr´-jăth-jē´-ā-rĭm til *plássið sum* Dávid hevði fyribúgvið til hennara: tí at hann hevði sligið upp eitt tjald til hennara í Jerusalem.

5 Harafturat messing altarið, sum Bĕz-á´-lēēl Ū´-rī-s sonur Hūrs sonar hevði gjørt, setti hann frammanfyri tabernakkul HARRANS: og Sálomon og samkoman søktu innat tí.

6 Og Sálomon fór upp hagar til messing altarið framfyri HARRAN, sum *var* við samkomu-tabernaklið, og ofraði túsund brennioffur uppiá tí.

7 ¶ Í teirri nátt birtist Guð at Sálomoni, og segði við hann, Umbið hvat eg skal geva tær.

8 Og Sálomon segði við Guð, Tú hevurt sýnt mikla miskunn at Dávidi, faðir mínum, og hevurt fingið meg at ráða í hansara stað.

9 Nú, O HARRI Guð, lat tína fyrijáttan at Dávidi, faðir mínum, verða grundfesta: tí at tú hevurt gjørt meg *til* kong yvir einum fólki, líka *sum* dust jarðarinnar í fjøldleika.

10 Gev mær nú vísdóm og kunnleika, at eg má fara út og koma inn frammanfyri hesum fólkinum: tí at hvør kann døma hetta fólk títt, *sum er so* mikið?

11 Og Guð segði til Sálomons, Av tí at hetta var í hjarta tínum, og tú hevurt ikki umbiðið ríkidømir, eyð, ella heiður, ella lívið hjá figgindum tínum, eiheldur tá hevurt umbiðið langt lív; men hevurt umbiðið vísdóm og kunnleika til tín sjálvs, at tú mást døma fólk mítt, yvir hvørjum eg havi gjørt teg *til* kong:

12 *Er* vísdómur og kunnleiki veittur tær; og eg vil geva tær ríkdómar, og eyð, og heiður; slíkt sum eingir av kongunum hava havt, sum *hava verið* undan tær, eiheldur skal tað nakar eftir teg hava líkan.

13 ¶ Tá kom Sálomon *frá síni ferð* til tað høga plássið, sum *var* í Gibeon, til Jerusalem, frammanfyri ífrá samkomu-tabernaklinum, og ríkti yvir Ísrael.

14 Og Sálomon savnaði vagnar og hestmenn: og hann hevði eitt túsund og fýra hundrað vagnar, og tólv túsund hestmenn, sum hann staðsetti í vagn-staðunum, og hjá kongi í Jerusalem.

15 Og kongur gjørdi silvur og gull í Jerusalem *so ríkiligsamt* sum steinar, og sedristrø gjørdi hann sum morberjatrøini sum *eru* í dalinum í ríkiligleika.

16 Og Sálomon fekk hestar førdar út úr Egyptalandi, og lín garn: keypmenninir hjá kongi fingu lín garnið til ein prís.

17 Og teir heintaðu upp, og førdu fram út úr Egyptalandi ein vagn fyri seks hundrað *sjé-kl-ar* av silvuri, og ein hest fyri eitt hundrað og fimti: og so førdu teir út *hestar* til allar kongarnar av Hittitunum, og til kongarnar av Sýriulandi, eftir brøgdum sínum.

KAPITUL 2

OG Sálomon ráddi av at byggja eitt hús til navns HARRANS, og eitt hús til kongadømis síns.

2 Og Sálomon taldi út trísinstjúgu og tíggju túsund menn til at bera byrður, og fýrsinstjúgu túsund til at høgga í fjallinum, og trý túsund og seks hundrað til at *hava* umsjón *yvir* teimum.

3 ¶ Og Sálomon sendi til Hū-răm-s, kongin av Týrus, sigandi, Sum tú fórt við Dávidi, faðir mínum, og sendirt honum sedristrø til at byggja sær eitt hús til at búgva hari, *enntá soleiðis far við mær.*

4 Sí, eg byggi eitt hús til navns HARRANS Guðs míns, til at víga *tað* til hansara, *og* til at brenna frammi fyri honum søtt roykilsi, og til hitt áframhaldandi sýnisbreyðið, og til brenniofrini morgun og kvøld, á sabbatunum, og á nýmánunum, og á hátíðar-veitslum HARRANS Guðs várs. Hetta *er ein regluskipan* um ævir fyri Ísrael.

5 Og húsið, sum eg byggi, *er* mikið: tí at mikil *er* Guð okkara omanfyri allar gudar.

6 Men hvør er førur fyri at byggja honum eitt hús, eftirsum *at* himinin og himin av himnum kunnu ikki rúma hann? hvør *eri* eg tá, at eg skuldi bygt honum eitt hús, uttan einans til at brenna sláturoffur frammi fyri honum?

7 Send mær nú tessvegna ein mann, hegnigur at virka í gulli, og í silvuri, og í messing, og í jarni, og í purpuri, og skarlaksreyðum, og bláum, og sum dugir kønleika til at rista við hegnigum monnum, sum *eru* hjá mær í Judah og í Jerusalem, hvørjar Dávid, faðir mín, skaffaði.

8 Send mær eisini sedristrø, furutrø, og ăl-gŭm-trø, út úr Lī-bă-nŏn: tí eg veit, at tænarar tínir duga kønleika at skera timbur í

Lī´-bă-nŏn; og sí, tænarar mínir *skulu vera* við tænarum tínum,
9 Enntá til at fyribúgva mær timbur í ríkiligleika: tí at húsið, sum eg eri um at byggja, *skal vera* undurfult stórt.
10 Og sí, eg vil geva til tænara tína, høggaranna sum skera timbur, tjúgu túsund mál av bardum hveiti, og tjúgu túsund mál av byggi, og tjúgu túsund bāth av víni, og tjúgu túsund bāth av olju.
11 ¶ Tá svaraði Hū´-răm, kongurin av Týrus, í skrift, sum hann sendi til Sálomons, Av tí at HARRIN hevur elskað sítt fólk, hevur hann gjørt teg *til* kong yvir teimum.
12 Hū´-răm segði harafturat, Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Ísraels, sum gjørdi himin og jørð, hvør givið hevur til kong Dávids ein vísan son, yvirklæddan við hygni og skili, sum kundi byggja eitt hús til HARRANS, og eitt hús til kongadømis síns.
13 Og nú, eg havi sent ein hegnigan mann, yvirklæddan við skili, hjá Hū´-răm-i, faðir mínum,
14 Sonurin hjá eini kvinnu av døtrum Dáns, og hansara faðir *var* ein maður úr Týrus, kønur at virka í gulli, og í silvuri, í messing, í jarni, í steini, og í timbri, í purpuri, í bláum, og í fínum líni, og í skarlaksreyðum; eisini til at rista okkurt háttarlag av risting, og til at finna út hvørja upphugsan sum skal verða sett fyri hann, við tínum hegnigu monnum, og við teimum hegnigu monnunum hjá Dávidi, harra mínum, faðir tínum.
15 Nú tessvegna, hveitið, og byggið, oljuna, og vínið, sum harri mín hevur talað um, lat hann senda at tænarum sínum:
16 Og vit vilja skera við úr Lī´-bă-nŏn, so nógv sum tær skal tørva: og vit vilja koma við honum til tín í flakum eftir sjógvi til Joppu; og tú skalt føra hann niðan til Jerusalem.
17 ¶ Og Sálomon upptaldi allar teir fremmandu, sum *vóru* í landi Ísraels, eftir uppteljingini, við hvørji Dávid, faðir hansara, hevði upptalt teir; og teir vórðu funnir eitt hundrað og fimti túsund og trý túsund og seks hundrað.
18 Og hann setti trísinstjúgu og tíggju túsund av teimum *at vera* berarar av byrðum, og fýrsinstjúgu túsund *at vera* høggarar í fjallinum, og trý túsund og seks hundrað umsjónarmenn at seta fólkið til verks.

KAPITUL 3

TÁ byrjaði Sálomon at byggja hús HARRANS í Jerusalem á Mō´-rī-ăh fjalli, hvar *HARRIN* birtist Dávidi, faðir hansara, á tí staði sum Dávid hevði fyribúgvið á treskigólvi Ōr´-năn-s Jĕb-ū-sīt´-a.
2 Og hann byrjaði at byggja í øðrum *deginum* av øðrum mánaðinum, í tí fjórða árinum av ríkjan síni.
3 ¶ Nú, hetta *eru tingini, í hvørjum* Sálomon varð leiðbeindur til byggingina av húsi Guðs. Longdin í alnum eftir hinum fyrsta máti *var* trísinstjúgu alnir, og breiddin tjúgu alnir.
4 Og forhøllin, sum *var* frammanfyri *húsið,* longdin *á henni var* samsvarandi við breiddina á húsinum, tjúgu alnir, og hæddin *var* eitt hundrað og tjúgu: og hann yvirklæddi hana innan við skírum gulli.
5 Og hitt miklara húsið tiljaði hann við furutræi, sum hann yvirklæddi við fínum gulli, og setti hará pálmatrø og ketur.
6 Og hann prýddi húsið við dýrabærum steinum til vakurleika: og gullið *var* gull úr Pâr´-vă-ĭm.

7 Hann yvirklæddi eisini húsið, bummarnar, stólparnar, og veggir tess, og hurðar tess, við gulli; og risti chêr-û-bĭm´-ar á veggirnar.

8 Og hann gjørdi hitt mest heilaga húsið, longdin á hvørjum *var* samsvarandi við breiddina á húsinum, tjúgu alnir, og breiddin hará tjúgu alnir: og hann yvirklæddi tað við fínum gulli, *rúgvandi upp* til seks hundrað talentir.

9 Og vektin á naglunum *var* fimti sjé´-kl-ar av gulli. Og hann yvirklæddi tey ovaru kømrini við gulli.

10 Og í tí mest heilaga húsinum gjørdi hann tveir chêr-û-bĭm´-ar av myndverki, og yvirklæddi teir við gulli.

11 ¶ Og veingirnir á chêr-û-bĭm´-unum *vóru* tjúgu alnir langir: ēin vongur *á tí eina cherubinum var* fimm alnir, røkkandi til veggin á húsinum: og hīn vongurin *var líkaleiðis* fimm alnir, røkkandi til vongin á hīnum cherubinum.

12 Og *ēin* vongur á hīnum cherubinum *var* fimm alnir, røkkandi til veggin á húsinum: og hīn vongurin *var* fimm alnir *eisini*, sameinandi til vongin hjá hīnum cherubinum.

13 Veingirnir á hesum chêr-û-bĭm´-unum breiddu seg fram tjúgu alnir: og teir stóðu á fótum sínum, og teirra andlit *vóru* inneftir.

14 ¶ Og hann gjørdi forhangið *av* bláum, og purpuri, og skarlaksreyðum, og fínum líni, og virkaði chêr-û-bĭm´-ar hará.

15 Eisini gjørdi hann frammanfyri húsið tvær súlur á tríati og fimm alnir høgar; og súluhøvdið, sum *var* á toppinum á hvørjum av teimum, *var* fimm alnir.

16 Og hann gjørdi ketur, *sum* í oraklinum, og setti *tær* á høvdini á súlunum; og gjørdi eitt hundrað granateplir, og setti *tey* á keturnar.

17 Og hann reisti upp súlurnar frammanfyri templið, ēina til hinnar høgru handar, og hīna til hinnar vinstru; og kallaði navnið á teirri til hinnar høgru handar Já´-chĭn, og navnið á teirri til hinnar vinstru Bó´-ăz.

KAPITUL 4

HARAFTURAT gjørdi hann eitt altar av messing, tjúgu alnir longdin hará, og tjúgu alnir breiddin hará, og tíggju alnir hæddin hará.

2 ¶ Eisini gjørdi hann ein bræddan sjógv á tíggju alnir frá trom til trom, rundur í kringferð, og fimm alnir hæddin hará; og ein linja á tríati alnir kringfór hann runt umkring.

3 Og undir honum *var* líksemin av oksum, sum kringfóru hann runt umkring: tíggju í eini alin, kringfarandi sjógvin runt íkring. Tvær røðir av oksum *vórðu* stoyptar, tá ið hann varð stoyptur.

4 Hann stóð uppiá tólv oksum, tríggir horvandi ímóti norðan, og tríggir horvandi ímóti vestan, og tríggir horvandi ímóti sunnan, og tríggir horvandi ímóti eystan: og sjógvurin *varð settur* uppiyvir uppá teir, og allir teirra aftaru partar *vóru* inneftir.

5 Og tjúkdin á honum *var* ein hondbreidd, og tromin á honum líka *sum* verkið á tromini á einum bikari, við blómum av liljum; *og* hann móttók og helt trý túsund báth.

6 ¶ Hann gjørdi eisini tíggju tváttarker, og setti fimm til hinnar høgru handar, og fimm til hinnar vinstru, til at tváa í teimum: slík ting, sum teir ofraðu til brenniofrið, tváaðu teir í teimum; men sjógvurin *var* til prestarnar at tváa *sær* í.

7 Og hann gjørdi tíggju ljósastakar av gulli samsvarandi við teirra form, og setti *teir* í templið,

fimm til hinnar høgru handar, og fimm til hinnar vinstru.

8 Hann gjørdi eisini tíggju borð, og setti *tey* í templið, fimm á hini høgru síðu, og fimm á hini vinstru. Og hann gjørdi eitt hundrað kør av gulli.

9 ¶ Ennvíðari gjørdi hann forgarðarnar hjá prestunum, og hin mikla forgarðin, og hurðar til forgarðin, og yvirklæddi hurðarnar av teimum við messing.

10 Og hann setti sjógvin á hini høgru síðu av eystur endanum, yvir ímóti sunnan.

11 Og Hū́-ram gjørdi pottarnar, og skuplurnar, og kørini. Og Hū́-răm fullførdi verkið sum hann átti at gera fyri Sálomon kong til húsar Guðs;

12 *Tað vil siga,* tær tvær súlurnar, og kúlurnar; og súluhøvdini *sum vóru* á toppinum av teimum tveimum súlunum; og tær tvær flættingarnar til at dekka tær tvær kúlurnar hjá súluhøvdunum, sum *vóru* á toppinum av súlunum;

13 Og fýra hundrað granateplir á tær tvær flættingarnar; tvær røðir av granateplum á hvørjari flætting, til at dekka tær tvær kúlurnar hjá súluhøvdunum, sum *vóru* uppiá súlunum.

14 Hann gjørdi eisini undirstøður, og tváttarkør gjørdi hann uppá undirstøðurnar;

15 Ein sjógv, og tólv oksar undir honum.

16 Grýturnar eisini, og skuplurnar, og kjøtkrókarnar, og øll reiðini hjá teimum, gjørdi Hū́-răm, faðir hansara, til Sálomon kongs til hús HARRANS av bjørtum messingi.

17 Í Jordans-slættanum stoypti kongur tey, í leirlendinum ímillum Sūć-cōth og Zĕr-ē-dá́-thăh.

18 Svá gjørdi Sálomon øll hesi reiðini í miklum ríkiligleika: tí at vektin á messinginum kundi ikki verða funnin útav.

19 ¶ Og Sálomon gjørdi øll reiðini sum *vóru til* húsar Guðs; hitt gylta altar eisini; og borðini, hvará sýnisbreyðið *varð sett;*

20 Harafturat ljósastakarnar við lompum teirra, at teir skuldu brenna eftir háttarlaginum frammanfyri oraklið, av skírum gulli;

21 Og blómurnar, og lampurnar, og *veik*tengurnar, *gjørdi hann av* gulli, *og* tað fullkomnum gulli;

22 Og ljósasaksarnar, og kørini, og sleivirnar, og eldpannurnar, *av* skírum gulli: og inngongdin av húsinum, tær innaru hurðarnar av tí fyri tað mest heilaga *plássið,* og hurðarnar av húsi tempulsins, *vóru av* gulli.

KAPITUL 5

SOLEIÐIS varð alt arbeiðið, sum Sálomon gjørdi til hús HARRANS, fullført: og Sálomon førdi inn *øll* tingini sum Dávid, faðir hansara, hevði vígt; og silvurið, og gullið, og øll amboðini, setti hann millum dýrgripa húsar Guðs.

2 ¶ Tá savnaði Sálomon saman teir elstu av Ísrael, og øll høvdini av ættargreinunum, teir fremstu av fedrum Ísraels barna, at Jerusalem, at føra niðan ørk sáttmála HARRANS út úr staði Dávids, sum *er* Zion.

3 Hvørsvegna allir menninir av Ísrael fylktu seg sjálvar at kongi í hátíðini, sum *var* í tí sjeynda mánaðinum.

4 Og allir teir elstu av Ísrael komu; og Levitarnir tóku upp ørkina.

5 Og teir førdu niðan ørkina, og samkomu-tabernaklið, og øll tey heilagu reiðini sum *vóru* í tabernaklinum, hesi førdu prestarnir *og* Levitarnir niðan.

6 Eisini Sálomon kongur, og øll samkoma Ísraels sum vóru fylkjaðir at honum frammanfyri ørkini, sláturofraðu seyð og oks-

ar, sum kundu ei verða taldir, ella upproknaðir, fyri fjøldleika.

7 Og prestarnir førdu inn ørk sáttmála HARRANS at plássi hans, til oraklið av húsinum, inn í tað mest heilaga *plássið, enntá* undir veingir chêr-û-bĭm´-anna:

8 Tí at chêr-û-bĭm´-arnir breiddu fram *sínar* veingir yvir pláss arkarinnar, og chêr-û-bĭm´-arnir dekkaðu ørkina og stavirnar hará í erva.

9 Og teir drógu út stavir *arkarinnar,* at endarnir á stavunum vórðu sæddir frá ørkini frammanfyri oraklið; men teir vórðu ikki sæddir uttanfyri. Og har er hon at hesum degi.

10 *Tað var* einkið í ørkini, uttan tær tvær talvurnar, sum Móses setti *hará* við Hór´-ĕb, tá ið HARRIN gjørdi *ein sáttmála* við Ísraels børn, tá ið teir komu út úr Egyptalandi.

11 ¶ Og tað bar á, tá ið prestarnir vóru komnir út úr tí heilaga *plássinum:* (tí at allir prestarnir, *sum vóru* tilstaðar, vóru halgaðir, *og* vartaðu ikki *tá* eftir skifti:

12 Eisini Levitarnir, *sum vóru* sangararnir, allir av teimum av Á-săph-i, av Hĕ´-măn-i, av Jĕ´-dŭthûn, við sonum sínum og brøðrum sínum, *verandi* uppskrýddir í hvítt lín, havandi glymskálir og psaltrar og hørpur, stóðu við eystur endan av altarinum, og við teimum eitt hundrað og tjúgu prestar, ljóðandi við lúðrum:)

13 Tað bar enntá á, sum lúðrablásararnir og sangararnir *vóru* sum ĕitt, til at gera ĕitt ljóð at verða hoyrt í at prísa og takka HARRANUM; og tá ið teir lyftu upp rødd *síni* við lúðrunum og glymskálunum og tónleiks-ljóðførunum, og prísaðu HARRANUM, *sigandi,* Tí at *hann er* góður; tí hansara miskunn *varir* um ævir: at húsið *tá* varð fylt við einum skýggi, *enntá* hús HARRANS;

14 So at prestarnir fingu ikki staðið til at tæna uppá grund av skýgginum: tí at dýrd HARRANS hevði fylt hús Guðs.

KAPITUL 6

TÁ segði Sálomon, HARRIN hevur sagt, at hann vildi búgva í tí tjúkka myrkrinum.

2 Men eg havi bygt eitt bústaðarhús til tín, og eitt pláss til tína búgving um ævir.

3 Og kongur vendi andliti sínum, og vælsignaði alla samkomu Ísraels: og øll samkoma Ísraels stóð.

4 Og hann segði, Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Ísraels, hvør við sínum hondum hevur uppfylt *tað,* sum hann talaði við sínum munni til faðirs míns Dávids, sigandi,

5 Síðan tann dag ið eg førdi fram fólk mítt út úr Egyptalandi, valdi eg ongan stað millum allar ættargreinir Ísraels at byggja eitt hús í, at mítt navn mátti vera har; eiheldur valdi eg nakran mann til at vera ein stjórnari yvir fólki mínum Ísrael:

6 Men eg havi valt Jerusalem, at mítt navn mátti vera har; og havi valt Dávid til at vera yvir fólki mínum Ísrael.

7 Nú, tað var í hjartanum hjá Dávidi, faðir mínum, at byggja eitt hús til navns HARRANS Guðs Ísraels.

8 Men HARRIN segði til Dávids, faðirs míns, Eftirsum at tað var í hjarta tínum at byggja eitt hús til navns míns, gjørdirt tú væl í at tað var í hjarta tínum:

9 Hóast hetta, tú skalt ikki byggja húsið; men sonur tín, sum skal koma fram út úr lendum tínum, hann skal byggja húsið til navns míns.

10 HARRIN tessvegna hevur útint sítt orð sum hann hevur talað: tí at eg eri risin upp í rúm Dávids, faðirs míns, og eri setstur

á hásæti Ísraels, eins og HARRIN fyrijáttaði, og havi bygt húsið til navns HARRANS Guðs Ísraels.
11 Og í tað havi eg sett ørkina, í hvørji *er* sáttmáli HARRANS, sum hann gjørdi við børn Ísraels.
12 ¶ Og hann stóð frammanfyri altar HARRANS í nærveruni av allari samkomu Ísraels, og breiddi fram sínar hendur:
13 Tí at Sálomon hevði gjørt ein messing pall, á fimm alnir langur, og fimm alnir breiður, og tríggjar alnir høgur, og hevði sett hann í miðjan forgarðin: og uppiá honum stóð hann, og knelaði niður uppá síni knø frammi fyri allari samkomu Ísraels, og breiddi fram sínar hendur mót himni,
14 Og segði, O HARRI Guð Ísraels, *tað er* eingin Guð líka *sum* tú í himninum, ella á jørðini; sum heldurt sáttmála, og *sýnirt* miskunn at tænarum tínum, sum ganga frammi fyri tær við øllum hjørtum sínum:
15 Tú, sum hevurt hildið hjá tænara tínum Dávidi, faðir mínum, tað, sum tú hevurt fyrijáttað honum; og talaðirt við munni tínum, og hevurt uppfylt *tað* við hond tíni, sum *tað er* henda dag.
16 Nú tessvegna, O HARRI Guð Ísraels, halt hjá tænara tínum Dávidi, faðir mínum, tað, sum tú hevurt fyrijáttað honum, sigandi, Tað skal ikki svitast tær ein mann í eygsjón míni at sita uppiá hásæti Ísraels; tó so at børn tíni gevi gætur eftir vegi sínum at ganga í lóg míni, eins og tú hevurt gingið frammi fyri mær.
17 So nú, O HARRI Guð Ísraels, lat orð títt verða sannað, sum tú hevurt talað innat tænara tínum Dávidi.
18 Men vil Guð í sjálvari roynd *og veru* búgva hjá monnum á jørðini? sí, himin og himin himna kunnu ikki rúma tær; hvør mikið minni hetta hús sum eg havi bygt!
19 Hav fyrilit, tessvegna, fyri bøn tænara tíns, og fyri umbøning hans, O HARRI Guð mín, at lýða á rópið og bønina sum tænari tín biður frammi fyri tær:
20 At tíni eygu mega vera opin omanyvir hetta hús dag og nátt, omanyvir plássið, hvarum tú hevurt sagt, at tú vildirt seta títt navn har; at lýða á bønina sum tænari tín biður mót hesum plássi.
21 Lýð tí á umbøningar tænara tíns, og fólks tíns Ísraels, sum teir skulu gera mót hesum plássi: hoyri tú frá tínum bústaði, *enntá* frá himni; og tá ið tú hoyrirt, fyrigev.
22 ¶ Um ein maður syndi ímóti næsta sínum, og ein eiður verði lagdur uppá hann at fáa hann at svørja, og eiðurin komi framfyri títt altar í hesum húsi;
23 Tá hoyri tú frá himni, og ger, og døm tænarar tínar, við at viðurgjalda tí vonda, við at endurgjalda hansara veg omanyvir hans egna høvd; og við at rættvísgera hin rættvísa, við at geva honum samsvarandi við hansara rættvísi.
24 ¶ Og um fólk títt Ísrael verði sett til hins verra frammi fyri fíggindanum, av tí at teir hava syndað ímóti tær; og skulu venda aftur og játta navn títt, og biðja og gera umbøning frammi fyri tær í hesum húsi;
25 Tá hoyri tú frá himnunum, og fyrigev synd fólks tíns Ísraels, og før teir aftur at landinum sum tú gavst til teirra og til teirra fedrar.
26 ¶ Tá ið himinin er lokaður fyri, og tað er einkið regn, av tí at teir hava syndað ímóti tær; *tó* um teir biðji mót hesum plássi, og játti navn títt, og vendi frá síni synd, tá ið tú nívirt teir;
27 Tá hoyri tú frá himni, og fyrigev synd tænara tína, og fólks tíns Ísraels, tá ið tú hevurt lært

teir hin góða veg, í hvørjum teir skuldu ganga; og send regn omanyvir land títt, sum tú hevurt givið fólki tínum til arvs.

28 ¶ Um tað veri hallár í landinum, um tað veri drepsótt, um tað veri svartaroði, ella gulnan, ongsprettur, ella jarðvargar; um teirra fíggindar kringseti teir í staðum lands teirra; hvørsumhelst plága, ella hvørsumhelst sjúka *tað veri seg:*

29 *Tá* hvør bøn *ella* hvør umbøning sumhelst, *ið* skal verða gjørd av nøkrum manni, ella av øllum tínum fólki Ísrael, tá ið hvør *og* ēin skal kenna sín egna trega og sín egna harm, og skal breiða fram sínar hendur í hesum húsi:

30 Tá hoyri tú frá himni — tínum bústaði, og fyrigev, og rinda hvørjum manni sambært øllum vegum hans, hvørs hjarta tú kennirt; (tí at tú einans kennirt hjørtu mannabarnanna:)

31 At teir mega óttast teg, at ganga í vegum tínum, so leingi sum teir liva í landinum sum tú gavst fedrum várum.

32 ¶ Harafturat viðvíkjandi tí fremmanda, sum er ikki av fólki tínum Ísrael, men er komin frá einum fjarløgdum landi fyri mikla navns tíns skuld, og tínar máttugu handar, og tíns útrætta arms; um teir komi og biðji í hesum húsi;

33 Tá hoyri tú frá himnunum, *enntá* frá tínum bústaði, og ger samsvarandi við alt sum tann fremmandi kallar til tín um; at øll fólk jarðarinnar mega kenna títt navn, og óttast teg, eins og *ger* fólk títt Ísrael, og mega vita, at hetta hús, sum eg havi bygt, er kallað eftir navni tínum.

34 Um títt fólk fari út til kríggj ímóti sínum fíggindum eftir veginum sum tú skalt senda teir, og teir biðji at tær mót hesum staði sum tú hevurt valt, og húsinum sum eg havi bygt til navns tíns;

35 Tá hoyri tú frá himnunum teirra bøn og teirra umbøning, og uppihalt teirra søk.

36 Um teir syndi ímót tær, (tí at *tað er* eingin maður, sum syndar ikki,) og tú verði firtin við teir, og flýggi teir yvir frammi fyri fíggindum *teirra,* og teir beri teir burt *til* fangar at einum landi langt burturi ella nær;

37 Tó *um* teir hugsi seg um í tí landi, hvagar teir eru bornir *til* fanga, og vendi og biðji at tær í landinum av sínum fangaskapi, sigandi, Vit hava syndað, vit hava gjørt óbeint, og hava farið fram vondliga;

38 Um teir vendi aftur til tín við øllum sínum hjarta og við allari síni sál í landinum av sínum fangaskapi, hvagar teir hava borið teir *til* fangar, og biðji mót sínum landi sum tú gavst teirra fedrum, og *mótvegis* staðinum sum tú hevurt valt, og mótvegis húsinum sum eg havi bygt til navns tíns:

39 Tá hoyri tú frá himnunum, *enntá* frá tínum bústaði, teirra bøn og teirra umbøningar, og uppihalt teirra søk, og fyrigev tínum fólki sum hava syndað ímót tær.

40 Nú, Guð mín, lat, eg bøni teg, tíni eygu vera opin, og *lat* tíni oyru *vera* gáin at bønini *sum er gjørd* í hesum plássi.

41 Nú tessvegna reis *teg,* O HARRI Guð, inn í hvílustað títt, tú og ørkin av tíni styrki: lat tínar prestar, O HARRI Guð, vera klæddar við frelsu, og lat tínar heilagu fegnast í góðsku.

42 O HARRI Guð, vend ikki burtur andliti salvaða tíns: minst til miskunnir Dávids, tænara tíns.

KAPITUL 7

NÚ, tá ið Sálomon hevði lokið við at biðja, kom eldurin niður frá himni, og upptærdi brenniofrið og sláturofrini; og dýrd HARRANS fylti húsið.

2 Og prestarnir fingu ikki innfarið inn í hús HARRANS, av tí at dýrd HARRANS hevði fylt hús HARRANS.

3 Og tá ið øll børn Ísraels sóu, hvussu eldurin kom niður, og dýrd HARRANS uppiá húsinum, boygdu teir seg við sínum andlitum til jarðarinnar uppá steinsetingina, og tilbóðu, og prísaðu HARRANUM, *sigandi,* Tí at *hann er* góður; tí hansara miskunn *varir* um ævir.

4 ¶ Tá ofraðu kongur og alt fólkið sláturoffurˇ frammi fyri HARRANUM.

5 Og Sálomon kongur ofraði eitt sláturoffur á tjúgu og tvey túsund oksar, og eitt hundrað og tjúgu túsund seyðir: so kongur og alt fólkið innvígaðu hús Guðs.

6 Og prestarnir vartaðu um síni embætir: Levitarnir eisini við tónleiks-ljóðførum hjá HARRANUM, sum Dávid kongur hevði gjørt til at prísa HARRANUM *við,* av tí at hansara miskunn *varir* um ævir, tá ið Dávid prísaði viðˆ teirra tænastu; og prestarnir ljóðaðu lúðrar frammanfyri teimum, og alt Ísrael stóð.

7 Harafturat halgaði Sálomon miðjan forgarðin, sum *var* frammanfyri hús HARRANS: tí at har ofraði hann brennioffurˇ, og feittið av friðofrunum, av tí at messing altarið, sum Sálomon hevði gjørt, var ikki fært fyri at taka ímóti brenniofrunum, og matofrunum, og feittinum.

8 ¶ Eisini á hini somu tíð helt Sálomon hátíðina sjey dagar, og allur Ísrael við honum, ein sera mikil samkoma, frá innfaringini inn av Há´-măth at Egyptalands á.

9 Og á tí áttanda deginum gjørdu teir eina hátíðar-samkomu: tí at teir hildu vígsluna av altarinum sjey dagar, og hátíðina sjey dagar.

10 Og á tí trý og tjúgunda deginum av tí sjeynda mánaðinum sendi hann fólkið avstað inn í tjøld teirra, glað og kát í hjarta fyri ta góðsku sum HARRIN hevði sýnt Dávidi, og fyri Sálomoni, og fyri Ísrael fólki sínum.

11 Svá fullførdi Sálomon hús HARRANS, og kongshúsið: og alt sum kom inn í hjartað hjá Sálomoni at gera í húsi HARRANS, og í sínum egna húsi, framdi hann framgongdarsamliga.

12 ¶ Og HARRIN birtist fyri Sálomoni um nátt*ina,* og segði við hann, Eg havi hoyrt bøn tína, og havi valt hetta stað til mín sjálvs til eitt sláturoffurs hús.

13 Um eg loki fyri himin, at tað verði einkið regn, ella um eg skipi ongsprettunum at uppeta landið, ella um eg sendi drepsótt millum fólk mítt;

14 Um fólk mítt, sum eru kallað viðˆ navni mínum, skulu eyðmýkja seg sjálv, og biðja, og søkja mítt andlit, og venda frá sínum vondu vegum; tá vil eg hoyra frá himni, og vil fyrigeva teirra synd, og vil grøða teirra land.

15 Nú skulu eygu míni vera opin, og míni oyru gáin yvirfyri bønini *sum verður gjørd* á hesum staði.

16 Tí at nú havi eg valt og halgað hetta hús, at mítt navn má vera har um ævir: og míni eygu og mítt hjarta skulu vera har viðvarandi.

17 Og hvat tær viðvíkur, um tú vilt ganga frammi fyri mær, eins og Dávid, faðir tín, gekk, og gera samsvarandi við alt sum eg havi áboðið tær, og skalt gáa um mínar ásetingar og mínar dómar;

18 Tá vil eg staðfesta hásæti kongadømis tíns, samsvarandi sum eg havi sáttmálast við Dávid, faðir tín, sigandi, Tað skal ikki svitast tær ein mann *til at vera* stjórnari í Ísrael.

19 Men um tit vendi burt, og yvirgevi mínar ásetingar og míni boð, sum eg havi sett frammanfyri tykkum, og skulu fara og tæna øðrum gudum, og tilbiðja teir;
20 Tá vil eg slíta teir upp við røturnar út úr landinum sum eg havi givið teimum; og hetta hús, sum eg havi halgað til navns míns, vil eg kasta út úr eygsjón míni, og vil fáa tað *at vera* eitt orðtak og eitt speiorð millum alra tjóða.
21 Og hetta hús, sum er høgt, skal vera ein ótan fyri hvørjum tí sum fer framvið tí; so at hann skal siga, Hví hevur HARRIN gjørt soleiðis at hesum landi, og at hesum húsi?
22 Og tað skal verða svarað, Av tí at teir yvirgóvu HARRAN Guð fedra sína, sum førdi teir fram út úr Egyptalandi, og løgdu hald á aðrar gudar, og tilbóðu teir, og tæntu teimum: tí hevur hann ført alt hetta illa uppá teir.

KAPITUL 8

OG tað bar á við endan á tjúgu árum, í hvørjum Sálomon hevði bygt hús HARRANS, og sítt egna hús,
2 At staðirnir sum Hū´-răm hevði endurbøtt til Sálomons, Sálomon bygdi teir, og voldi Ísraels børnum at dvøljast har.
3 Og Sálomon fór til Há´-măth-zō´-băh, og hevði yvirvág ímóti tí.
4 Og hann bygdi Tăd´-môr í oyðuni, og allar goymslu-staðirnar, sum hann bygdi í Há´-măth.
5 Hann eisini bygdi Bĕth-hór´-ōn tað ovara, og Bĕth-hór´-ōn tað niðara, girdar staðir, við múrum, portrum, og sláum;
6 Og Bă´-ă-lăth, og allar goymslu-staðirnar sum Sálomon hevði, og allar vagn-staðirnar, og staðirnar hjá hestmonnunum, og alt sum Sálomon tráaði at byggja í Jerusalem, og í Lī´-bă-nōn, og út gjøgnum alt land harradømis síns.
7 ¶ *Hvat viðvíkur* øllum fólkinum *sum vóru* eftir av Hittitunum, og Amoritunum, og Pē-rĭz-zīt´-unum, og Hī-vīt´-unum, og Jĕb-ū-sīt´-unum, sum *vóru* ikki av Ísrael,
8 *Men* av børnum teirra sum vóru eftirverandi eftir teir í landinum, hvørjar børn Ísraels upptærdu ikki, teir fekk Sálomon at gjalda íkast at hesum degi.
9 Men av børnum Ísraels gjørdi Sálomon ongar tænarar til arbeiðs síns; men teir *vóru* krígsmenn, og fremstir av høvuðsmonnum hans, og høvuðsmenn av vagnum hans og hestmonnum.
10 Og hesir *vóru* teir fremstu av yvirmonnum Sálomons kongs, *enntá* tvey hundrað og fimti, sum bóru stjórn yvir fólkinum.
11 ¶ Og Sálomon førdi niðan dóttur Pharaohs út úr staði Dávids at húsinum sum hann hevði bygt til hennara: tí hann segði, Vív mítt skal ikki búgva í húsi Dávids kongs av Ísrael, av tí at *plássini eru* heilag, hvarat ørk HARRANS hevur komið.
12 ¶ Tá ofraði Sálomon brennioffur˘ at HARRANUM á altari HARRANS, sum hann hevði bygt frammanfyri forhøllina,
13 Enntá eftir einum ávísum satsi hvønn dag, ofrandi samsvarandi við ábjóðan Móse, á sabbatunum, og á nýmánunum, og á hátíðar-festunum, tríggjar ferðir í árinum, *enntá* í hátíð ósúrgaðs breyðs, og í vikna-hátíðini, og í tabernakla-hátíðini.
14 ¶ Og hann fyriskipaði, samsvarandi við skipan Dávids, faðirs síns, skiftini hjá prestunum til teirra tænastu, og Levitarnar til teirra ásetingar, at prísa og tæna frammi fyri prestunum, sum skyldan hjá hvørjum degi kravdi: duravørðirnar eisini eftir teirra

skiftum við hvørt portrið: tí at soleiðis hevði Guðs maðurin Dávid áboðið.

15 Og teir viku ikki frá boði kongs at prestunum og Levitunum viðvíkjandi nøkrum máli, ella viðvíkjandi dýrgripunum.

16 Nú, alt verk Sálomons var fyribúgvið at degi grundleggingar HARRANS húss, og inntil tað var fullført. *So* hús HARRANS varð fullkomingjørt.

17 ¶ Tá fór Sálomon til Ē´-zīŏn-gē´-bĕr, og til Ē´-lōth, við sjóvarbreddan í landi Ē´-dóm-s.

18 Og Hū´-răm sendi honum viˆ hondum tænara sína skipˇ, og tænarar sum høvdu kunnleika til sævarins; og teir fóru við tænarum Sálomons til Ō´-phīr, og tóku haðani fýra hundrað og fimti talentir av gulli, og førdu *tær* til Sálomons kongs.

KAPITUL 9

OG tá ið drotningin av Sjē´-bă hoyrdi um navngiti Sálomons, kom hon at royna Sálomon við torførum spurningum í Jerusalem, við einum sera miklum samlagi, og kamelum sum bóru kryddurtir, og gull í ríkiligleika, og dýrabærar steinar: og tá ið hon var komin til Sálomons, samtalaði hon við hann um alt sum var í hjarta hennara.

2 Og Sálomon segði henni allar hennara spurningar: og tað var einkið fjalt frá Sálomoni, sum hann segði henni ikki.

3 Og tá ið drotningin av Sjē´-bă hevði sæð vísdómin hjá Sálomoni, og húsið sum hann hevði bygt,

4 Og mat borðs hansara, og sitingina hjá tænarum hansara, og umvartingina hjá hjálparfólkum hansara, og teirra skart; hansara bikarberar eisini, og teirra skart; og hansara uppgongd, eftir hvørji hann fór niðan í hús HARRANS; var tað eingin meira andi í henni.

5 Og hon segði til kongsins, *Tað var* eitt satt ummæli, sum eg hoyrdi í egna landi mínum um gerningar tínar, og um vísdóm tín:

6 Hvussu enn er, eg trúði ikki orðum teirra, inntil eg kom, og míni eygu høvdu sæð *tað:* og sí, tann ēina helvtin av mikilleikanum av vísdómi tínum var ikki søgd mær: *tí at* tú bert av tí navngitinum sum eg hoyrdi.

7 Sælir *eru* menn tínir, og sælir *eru* hesir tænarar tínir, sum standa støðugt frammi fyri tær, og hoyra vísdóm tín.

8 Vælsignaður veri HARRIN Guð tín, sum fragdaðist í tær at seta teg á hásæti sítt, *at vera* kongur fyri HARRAN Guð tín: av tí at Guð tín elskaði Ísrael, til at grundfesta teir um ævir, tí gjørdi hann teg *til* kong yvir teimum, at inna dóm og rættvísi.

9 Og hon gav kongi eitt hundrað og tjúgu talentir av gulli, og av kryddurtum miklan ríkiligleika, og dýrabærar steinar: eiheldur var tað nøkur slík kryddurt, sum drotningin av Sjē´-bă gav Sálomon kongi.

10 Og tænararnir eisini hjá Hū´-răm-i, og tænararnir hjá Sálomoni, sum førdu gull frá Ō´-phīr, førdu ăl´-gŭm trø og dýrabærar steinar.

11 Og kongur gjørdi *av* ăl´-gŭm trøunum gongupallar til húss HARRANS, og til slott kongsins, og hørpur og psaltrar til sangarar: og tað sóust eingi slík áður í landi Judah.

12 Og Sálomon kongur gav til drotningina av Sjē´-bă alla hennara trá, hvatsumhelst hon umbað, umframt *tað* sum hon hevði ført kongi. So hon vendi, og fór avstað til egna lands síns, hon og tænarar hennara.

13 ¶ Nú, vektin á gulli, sum kom til Sálomons í ēinum ári, var

seks hundrað og trísinstjúgu og seks talentir av gulli;
14 Umframt *tað sum* prutti-*sølu*menn og handilsmenn førdu. Og allir kongarnir av Arabiu og landsstjórar landsins førdu gull og silvur til Sálomons.
15 ¶ Og Sálomon kongur gjørdi tvey hundrað smáskildir *av* slignum gulli: seks hundrað *sjē´-kl-ar* av slignum gulli fóru til ēin smáskjøldur.
16 Og trý hundrað skildir *gjørdi hann av* slignum gulli: trý hundrað *sjē´-kl-ar* av gulli fóru til ēin skjøldur. Og kongur setti teir í hús Lī´-bă-nŏn-s skógar.
17 Harafturat gjørdi kongur eina mikla trónu av fílabeini, og yvirklæddi hana við skírum gulli.
18 Og *tað vóru* seks trin til trónuna, við einum skamli av gulli, *sum vóru* fest til trónuna, og stúttur hvørjumegin við sitiplássið, og tvær leyvur standandi við stútturnar:
19 Og tólv leyvur stóðu har á tí ēinu síðuni og á hīnari uppiá teimum seks trinunum. Tað varð ikki tílík gjørd í nøkrum kongadømi.
20 ¶ Og øll drekki-reiðini hjá Sálomon kongi *vóru av* gulli, og øll reiðini av húsi Lī´-bă-nŏn-s skógar *vóru av* skírum gulli: eingi *vóru av* silvuri; tað varð *ikki* nakað roknað um á døgum Sálomons.
21 Tí at skip kongsins fóru til Tarsjisj við tænarum Hū´-răm-s: hvørji trý ár ēinaferð komu Tarsjisj-skipini førandi gull, og silvur, fílabein, og apur, og páfuglar.
22 Og Sálomon kongur fór framum allar kongar jarðarinnar í ríkdómum og vísdómi.
23 ¶ Og allir kongar jarðarinnar søktu nærveru Sálomons, at hoyra hansara vísdóm, sum Guð hevði lagt í hjarta hansara.
24 Og teir førdu hvør maður sína gávu, reiðir av silvuri, og reiðir av gulli, og klædnað, brynju, og kryddurtir, hestar, og múldjór˘, ein sats ár um ár.
25 ¶ Og Sálomon hevði fýra túsund stallar til hestar og vagnar, og tólv túsund hestmenn; hvørjar hann fekk til høldar í vagn-borgunum, og hjá kongi í Jerusalem.
26 ¶ Og hann ríkti yvir øllum kongunum frá ánni alt at landi Philistanna, og til landamark Egyptalands.
27 Og kongur gjørdi silvur í Jerusalem sum steinar, og sedristrø gjørdi hann sum morberjatrøini sum *eru* í teimum lágu slættunum í ríkiligleika.
28 Og teir førdu at Sálomoni hestar út úr Egyptalandi, og út úr øllum londum.
29 ¶ Nú, restin av gerningum Sálomons, fyrstir og síðstir, *eru* teir ikki skrivaðir í bók Náthans prophets, og í prophetīinum hjá Á´-hī-jăh Sjī-lô-nīt´-a, og í sjónunum hjá Īd´-dō síggjara ímóti Jĕr-ó´-bô-ăm Nĕ´-băt-s syni?
30 Og Sálomon ríkti í Jerusalem yvir øllum Ísrael fjøruti ár.
31 Og Sálomon svav hjá fedrum sínum, og hann varð jarðaður í staði Dávids, faðirs síns: og Rĕ-hó´-bŏ-ăm, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 10

OG Rĕ-hó´-bŏ-ăm fór til Sjĕ´-chĕm: tí at til Sjĕ´-chĕm vóru allur Ísrael komnir at gera hann *til* kong.
2 Og tað bar á, tá ið Jĕr-ó´-bô-ăm Nĕ´-băt-s sonur, sum *var* í Egyptalandi, hvagar hann hevði flýggjað frá nærveru Sálomons kongs, hoyrdi *tað,* at Jĕr-ó´-bô-ăm kom aftur út úr Egyptalandi.
3 Og teir sendu og kallaðu hann. So Jĕr-ó´-bô-ăm og allur Ísrael komu og talaðu til Rĕ-hó´-bŏ-ăm-s, sigandi,

4 Tín faðir gjørdi ok okkara herviligt: nú tessvegna, lætti tú eitthvørt *um* hina herviligu trælkan faðirs tíns, og hansara tunga ok sum hann koyrdi uppá okkum, og vit vilja tæna tær.

5 Og hann segði við teir, Komið aftur at mær eftir tríggjar dagar. Og fólkið fór avstað.

6 ¶ Og Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongur ráðførdist við teir gomlu menninar sum høvdu staðið frammi fyri Sálomoni, faðir hansara, meðan hann enn livdi, sigandi, Hvat ráð geva tit *mær* at bera aftur svar til hesa fólks?

7 Og teir talaðu við hann, sigandi, Um tú veri blíður við hetta fólk, og toknist teim, og tali til teirra góð orð, vilja teir vera tænarar tínir um ævir.

8 Men hann yvirgav ráðið sum teir gomlu menninir góvu honum, og ráðførdist við teir ungu menninar sum vóru aldir upp við honum, sum stóðu frammi fyri honum.

9 Og hann segði við teir, Hvørja tilráðing geva tit, at vit mega bera aftur svar til hesa fólks, sum hava talað til mín, sigandi, Lætt eitthvørt *um* okið sum faðir tín setti uppá okkum?

10 Og teir ungu menninir, sum vóru aldir upp við honum, talaðu við hann, sigandi, Svá skalt tú svara fólkinum sum talaðu við teg, sigandi, Tín faðir gjørdi ok okkara tungt, men geri tú *tað* eitthvørt lættari hjá okkum; svá skalt tú siga við teir, Mín lítli *fingur* skal vera tjykri enn lendar faðirs míns.

11 Tí at hvarið faðir mín koyrdi eitt tungt ok uppá tykkum, vil eg leggja meira til oks tykkara: faðir mín agaði tykkum við koyrlum, men eg *vil aga tykkum* við sporðdrekum.

12 So Jĕr-ó´-bô-ăm og alt fólkið komu til Rĕ-hó´-bŏ-ăm-s á tí triðja deginum, eins og kongur beyð, sigandi, Komið aftur til mín á tí triðja deginum.

13 Og kongur svaraði teimum knortlasligani; og Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongur yvirgav ráðið hjá teimum gomlu monnunum,

14 Og svaraði teimum eftir tilráðingini hjá teimum ungu monnunum, sigandi, Mín faðir gjørdi ok tykkara tungt, men eg vil leggja aftrat hartil: faðir mín agaði tykkum við koyrlum, men eg *vil aga tykkum* við sporðdrekum.

15 So kongur lýddi ikki á fólkið: tí at søkin var av Guði, at HARRIN mátti útinna sítt orð, hvørt hann talaði við hendi Á-hĭ-jăh Sjî-lô-nĭt´-a til Jĕr-ó´-bô-ăm-s Nĕ´-băt-s sonar.

16 ¶ Og tá ið alt Ísrael *sá,* at kongur vildi ikki lýða á teir, svaraði fólkið kongi, sigandi, Hvønn skamt hava vit í Dávidi? og *vit hava* ongan arv í syni Ísai-s: hvør maður til tjalda tykkara, O Ísrael: *og* nú, Dávid, síggj til egna húss tíns. So alt Ísrael fór til tjalda sína.

17 Men *hvat* teimum Ísraels børnum *viðvíkur,* sum dvaldust í staðum Judah, Rĕ-hó´-bŏ-ăm ríkti yvir teimum.

18 Tá sendi Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongur Há´-dŏr-ăm, sum *var* yvir íkastinum; og Ísraels børn steinaðu hann við steinum, at hann doyði. Men Rĕ-hó´-bŏ-ăm kongur gjørdi skjótt *av* at koma sær upp til vagn *sín,* at flýggja til Jerusalem.

19 Og Ísrael gjørdi uppreist ímóti húsi Dávids at hesum degi.

KAPITUL 11

OG tá ið Rĕ-hó´-bŏ-ăm var komin til Jerusalem, savnaði hann av húsi Judah og Benjamins eitt hundrað og fýrsinstjúgu túsund útvaldar *menn,* sum vóru krígsmenn, at berjast ímóti Ísrael, at hann mátti føra kongadømið aftur til Rĕ-hó´-bŏ-ăm-s.

2 Men orð HARRANS kom til Sjĕm-aĭ´-ăh, Guðs mansins, sigandi,
3 Tala innat Rĕ-hó´-bŏ-ăm Sálomons syni, kongi av Judah, og til alt Ísrael í Judah og Benjamin, sigandi,
4 Svá sigur HARRIN, Tit skulu ikki fara upp, ella berjast ímóti brøðrum tykkara: vendið aftur hvør maður til húss síns: tí at hesin lutur er gjørdur av mær. Og teir lýddu orðum HARRANS, og vendu aftur frá at fara ímóti Jĕr-ó´-bô-ăm-i.
5 ¶ Og Rĕ-hó´-bŏ-ăm búði í Jerusalem, og bygdi staðir til verju í Judah.
6 Hann bygdi enntá Bethlehem, og Ē´-tăm, og Tē´-kô-ă,
7 Og Bĕth´-zūr, og Sjō´-cō, og Adullam,
8 Og Gáth, og Mă-rē´-sjâh, og Ziph,
9 Og Ăd-ō-rá´-ĭm, og Lá´-chĭsj, og Ă-zē´-kăh,
10 Og Zôr´-ah, og Aĭ´-jă-lōn, og Hē´-brōn, sum *eru* í Judah og í Benjamin, girdir staðir.
11 Og hann víggirdi hervirkini, og setti høvuðsmenn í tey, og goymslu av vistum, og av olju og víni.
12 Og í hvønn ēinstakan stað *setti hann* skildir og spjótˇ, og gjørdi teir avbera sterkar, havandi Judah og Benjamin á síni síðu.
13 ¶ Og prestarnir og Levitarnir, sum *vóru* í øllum Ísrael, leitaðu til hansara út úr øllum breddum sínum.
14 Tí at Levitarnir eftirlótu forstaðir sínar og ogn sína, og komu til Judah og Jerusalem: tí at Jĕr-ó´-bô-ăm og synir hansara høvdu kastað teir av frá at útinna prests-embætið at HARRANUM:
15 Og hann innsetti sær prestar til tey høgu plássini, og til djevlarnar, og til kálvarnar sum hann hevði gjørt.
16 Og eftir teimum, út úr øllum ættargreinum Ísraels, slíkir sum settu síni hjørtu at søkja HARRAN Guð Ísraels, komu til Jerusalem, at sláturofra at HARRANUM Guði fedra sína.
17 So teir styrktu kongadømi Judah, og gjørdu Rĕ-hó´-bŏ-ăm Sálomons son sterkan, trý ár: í trý ár gingu teir í vegi Dávids og Sálomons.
18 ¶ Og Rĕ-hó´-bŏ-ăm tók sær Má´-hâ-lăth, dóttur Jĕr´-ĭ-mōth-s Dávids sonar til konu; *og* Á´-bĭ-hāĭl dóttur Ē´-lĭ-ăb-s Ísai-s sonar;
19 Hvørjar føddu honum børn; Jē´-ūsj, og Sjâ-mär´-jăh, og Zá´-hăm.
20 Og eftir hana tók hann Má´-ă-chŭh Ăb´-să-lōm-s dóttur; sum bar honum Á´-bĭ-jăh, og Ăt´-tâ-ĭ, og Zĭ´-ză, og Sjĕ-lō´-mĭth.
21 Og Rĕ-hó´-bŏ-ăm elskaði Má´-ă-chŭh Ăb´-să-lōm-s dóttur uppum allar konur sínar og medkonur sínar: (tí hann tók átjan konur, og trísinstjúgu medkonur; og gat tjúgu og átta synir, og trísinstjúgu døtur.)
22 Og Rĕ-hó´-bŏ-ăm gjørdi Á´-bĭ-jăh, son Má´-ă-chŭh, *til* hin fremsta, *at vera* stjórnari millum brøður sínar: tí *hann hugsaði* at gera hann *til* kong.
23 Og hann handlaði vísliga, og útbreiddi av øllum børnum sínum út gjøgnum øll lands-*umráð*ini av Judah og Benjamin, at hvørjum girdum staði: og hann gav teimum vistir í ríkiligleika. Og hann tráaði mong vív.

KAPITUL 12

OG tað bar á, tá ið Rĕ-hó´-bŏ-ăm hevði grundfest kongadømið, og hevði styrkt seg sjálvan, yvirgav hann HARRANS lóg, og alt Ísrael við honum.
2 Og tað bar á, *at* í hinum fimta ári Rĕ-hó´-bŏ-ăm-s kongs kom Sjĭ´-sjăk kongur av Egyptalandi

upp ímóti Jerusalem, av tí at teir høvdu misbrotist ímóti HARRANUM,

3 Við tólv hundrað vagnum, og trísinstjúgu túsund hestmonnum: og fólkið *var* uttan tal sum komu við honum út úr Egyptalandi; Lû-bĭm´-arnir, Sŭk-kĭ-ĭm´-arnir, og Ê-thĭ-ō´-pĭ-ararnir.

4 Og hann tók teir girdu staðirnar sum *høyrdu* til Judah, og kom til Jerusalem.

5 ¶ Tá kom Sjĕm-aĭ´-ah prophetur til Rĕ-hó´-bō-ăm-s, og *til* Judah prinsa, sum vóru savnaðir saman til Jerusalem uppá grund av Sjĭ´-sjăk-i, og segði við teir, Svá sigur HARRIN, Tit hava yvirgivið meg, og tí havi eg eisini eftirlatið tykkum í Sjĭ´-sjăk-s hond.

6 Við hvat prinsarnir av Ísrael og kongur eyðmýktu seg; og teir søgdu, HARRIN *er* rættvísur.

7 Og tá ið HARRIN sá, at teir eyðmýktu seg, kom orð HARRANS til Sjĕm-aĭ´-ah, sigandi, Teir hava eyðmýkt seg; *tí* vil eg ikki oyða teir, men eg vil veita teimum onkra útfrían; og mín vreiði skal ei verða úthelt uppá Jerusalem viðˆ hendi Sjĭ´-sjăk-s.

8 Hóast hetta, teir skulu verða tænarar hansara; at teir mega kenna tænastu mína, og tænastu kongadøma landanna.

9 So Sjĭ´-sjăk kongur av Egyptalandi kom upp ímóti Jerusalem, og tók burtur dýrgripirnar av húsi HARRANS, og dýrgripirnar av húsi kongsins; hann tók allar: hann bar burtur eisini skjøldrarnar av gulli, sum Sálomon hevði gjørt.

10 Ístaðin fyri hvørjar Rĕ-hó´-bō-ăm kongur gjørdi skjøldrar av messing, og leit *teir* upp til handa hinna fremstu av lívverjuni, sum varðaðu inngongdina av kongshúsinum.

11 Og tá ið kongur inngekk inn í hús HARRANS, kom lívverjan og heintaði teir, og førdi teir aftur inn í lívvarðarherbergið.

12 Og tá ið hann eyðmýkti seg sjálvan, vendi vreiði HARRANS frá honum, at hann vildi ikki oyða *hann* fullkomiliga: og eisini í Judah gingu ting væl.

13 ¶ So Rĕ-hó´-bō-ăm kongur styrkti seg sjálvan í Jerusalem, og ríkti: tí at Rĕ-hó´-bō-ăm *var* ēin og fjøruti ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti seytjan ár í Jerusalem, staðinum sum HARRIN hevði valt burtur úr øllum ættargreinum Ísraels, at seta navn sítt har. Og navn móður hansara *var* Ná´-ă-măh, ein Amonitinna.

14 Og hann gjørdi ilt, av tí at hann fyribúði ikki sítt hjarta at søkja HARRAN.

15 Nú, gerningar Rĕ-hó´-bō-ăm-s, fyrstir og síðstir, *eru* teir ikki skrivaðir í bók Sjĕm-aĭ´-ah prophets, og Ĭd´-dō-s síggjara viðvíkjandi ættartølum? Og *tað vóru* kríggj ímillum Rĕ-hó´-bō-ăm og Jĕr-ó´-bō-ăm áframhaldandi.

16 Og Rĕ-hó´-bō-ăm svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður í staði Dávids: og Á´-bĭ-jăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 13

NÚ, í tí átjanda árinum hjá Jĕr-ó´-bō-ăm kongi byrjaði Á´-bĭ-jăh at ríkja yvir Judah.

2 Hann ríkti trý ár í Jerusalem. Navn móður hansara eisini *var* Mī-chaĭ´-ăh, dóttir Ū´-rĭ-ĕl-s úr Gĭ-bē´-ūh. Og tað var kríggj ímillum Á´-bĭ-jăh og Jĕr-ó´-bō-ăm.

3 Og Á´-bĭ-jăh stillaði kríggið í uppstilling við einum heri av reystum krígsmonnum, *enntá* fýra hundrað túsund útvaldum monnum: Jĕr-ó´-bō-ăm eisini stillaði bardagan í uppstilling ímóti honum við átta hundrað túsund útvaldum monnum, *verandi* mektigir reystsemis menn.

4 ¶ Og Á-bī-jāh stóð upp uppiá Zĕm-ă-rā-ĭm fjalli, sum *er* á Ē-phră-ĭm fjalli, og segði, Hoyrið meg, tú Jĕr-ó-bô-ăm, og allur Ísrael;

5 Áttu tit ikki at vitað, at HARRIN Guð Ísraels gav kongadømið yvir Ísrael til Dávids um ævir, *enntá* til hansara og til sona hansara við einum salts-sáttmála?

6 Tó er Jĕr-ó-bô-ăm Nē-băt-s sonur, tænari Sálomons Dávids sonar, risin upp, og hevur gjørt uppreist ímóti harri sínum.

7 Og tað eru savnaðir at honum fáfongdir menn, børn Bē-lĭ-ăl-s, og hava styrkt seg sjálvar ímóti Rĕ-hó-bō-ăm-i Sálomons syni, tá ið Rĕ-hó-bō-ăm var ungur og bleythjartaður, og kundi ikki standa ímóti teimum.

8 Og nú hugsa tit at standa ímóti kongadømi HARRANS í hond sona Dávids; og tit *veri* ein mikil fjøld, og *tað eru* við tykkum gyltir kálvar, sum Jĕr-ó-bô-ăm gjørdi tykkum til gudar.

9 Hava tit ikki kastað út prestar HARRANS, synir Aarons, og Levitarnar, og hava gjørt tykkum prestar eftir háttarlagi tjóða *annara* landa? so at hvørsumhelst *ið* kemur at víga seg við einum ungum ungtarvi og sjey lombum, *hin sami* má vera ein prestur hjá *teimum sum* eingir gudar *eru*.

10 Men hvat okkum viðvíkur, HARRIN *er* Guð okkara, og vit hava ikki yvirgivið hann; og prestarnir, sum tæna at HARRANUM, *eru* synir Aarons, og Levitarnir *varta* um gerning *sín:*

11 Og teir brenna HARRANUM hvønn morgun og hvørt kvøld brenni-sláturoffur˘ og søtt roykilsi: sýnisbreyðið eisini *seta teir í rættlag* uppá tað skíra borðið; og ljósastakan av gulli við lompum hansara, at brenna hvørt kvøld: tí at vit halda álegging HARRANS Guðs várs; men tit hava yvirgivið hann.

12 Og sí, Guð sjálvur *er* við okkum til *okkara* høvuðsmann, og hansara prestar við ljóðandi lúðrum at geyla uppveking ímóti tykkum. Ó børn Ísraels, berjist tit ei ímóti HARRANUM Guði fedra tykkara; tí at tit skulu ikki framganga.

13 ¶ Men Jĕr-ó-bô-ăm voldi eini slysáloyping at koma umkring aftanfyri teir: so teir vóru frammanfyri Judah, og slysáloypingin *var* aftanfyri teir.

14 Og tá ið Judah hugdi tilbakar, sí, bardagin *var* frammanfyri og aftanfyri: og teir geylaðu á HARRAN, og prestarnir ljóðaðu við lúðrunum.

15 Tá góvu menninir av Judah eitt róp: og sum menninir av Judah rópaðu, bar tað á, at Guð sló Jĕr-ó-bô-ăm og allan Ísrael frammi fyri Á-bī-jāh og Judah.

16 Og børn Ísraels flýddu frammi fyri Judah: og Guð flýggjaði teir inn í hond teirra.

17 Og Á-bī-jāh og fólk hansara vógu teir við eini miklari slátran: so tað fullu niður vignir av Ísrael fimm hundrað túsund útvaldir menn.

18 Svá vórðu børn Ísraels førdir undir á teirri tíð, og børn Judah høvdu yvirvág, av tí at teir stólaðu uppá HARRAN Guð fedra sína.

19 Og Á-bī-jāh elti eftir Jĕr-ó-bô-ăm-i, og tók staðir frá honum, Beth-el við býum tess, og Jē-sjá-nâh við býum tess, og Ē-phră-ĭm við býum tess.

20 Eiheldur endurvann Jĕr-ó-bô-ăm styrki aftur á døgum Á-bī-jāh: og HARRIN sló hann, og hann doyði.

21 ¶ Men Á-bī-jāh vaks mektigur, og giftist *við* fjúrtan konum, og gat tjúgu og tveir synir, og sekstan døtur.

22 Og restin av gerningum Á-bī-jāh, og hansara vegir, og hansara framsagnir, *eru* skrivað í søgu Ĭd-dō-s prophets.

KAPITUL 14

SO Á-bĭ-jăh svav hjá fedrum sínum, og teir jarðaðu hann í staði Dávids: og Á-să, sonur hansara, ríkti í hansara stað. Á hansara døgum var landið kvirt tíggju ár.

2 Og Á-să gjørdi *tað sum var* gott og rætt í eygum HARRANS Guðs síns:

3 Tí at hann tók burtur altarˇ hinna fremmandu *guda,* og hini høgu pláss, og breyt niður myndirnar, og skar niður lundirnar:

4 Og ábjóðaði Judah at søkja HARRAN Guð fedra sína, og at gera lógina og boðið.

5 Hann tók eisini burtur út úr øllum staðunum av Judah tey høgu plássini og myndirnar: og kongadømið var kvirt frammi fyri honum.

6 ¶ Og hann bygdi girdar staðir í Judah: tí at landið hevði hvílu, og hann hevði einkið kríggj í teimum árunum; av tí at HARRIN hevði givið honum hvílu.

7 Tessvegna segði hann við Judah, Latum okkum byggja hesar staðir, og gera kring *teir* múrar, og tornˇ, portурˇ, og sláir, *meðan* landið *er* enn frammi fyri okkum; av tí at vit hava søkt HARRAN Guð váran, vit hava søkt *hann,* og hann hevur givið okkum hvíld á hvørjari síðu. So teir bygdu og framgingu.

8 Og Á-să hevði ein her *av monnum* sum bóru smáskildir og spjótˇ, burtur úr Judah trý hundrað túsund; og burtur úr Benjamin, sum bóru skildir og spentu bogar, tvey hundrað og fýrsinstjúgu túsund: allir hesir *vóru* mektigir reystsemis menn.

9 ¶ Og tað kom út ímóti teimum Zĕ-răh Ê-thĭ-ŏ-pĭ-ari við einum herliði á eitt túsund túsund, og trý hundrað vagnum; og kom at Mă-rē-sjâh.

10 Tá fór Á-să út ímóti honum, og teir stillaðu bardagan í uppstilling í Zĕph-ă-thăh dalinum í Mă-rē-sjâh.

11 Og Á-să ópti á HARRAN Guð sín, og segði, HARRI, *tað er* einkið hjá tær at hjálpa, hvørt við mongum, ella við teimum ið ongan mátt hava: hjálp okkum, O HARRI Guð vár; tí vit styðjast á teg, og í navni tínum vit fara ímóti hesi fjøld. O HARRI, tú *ert* Guð vár; lat ikki mann *hava* yvirvág ímóti tær.

12 So HARRIN sló Ê-thĭ-ŏ-pĭ-arar-nar frammi fyri Á-să, og frammi fyri Judah; og Ê-thĭ-ŏ-pĭ-ararnir flýddu.

13 Og Á-să, og fólkið sum við honum *vóru,* eltu teir at Gē-răr: og Ê-thĭ-ŏ-pĭ-ararnir vórðu kollrendir, at teir kundu ikki koma aftur fyri seg; tí at teir vórðu oyddir frammi fyri HARRANUM, og frammi fyri herliði hansara; og teir bóru burtur sera nógvan herfong.

14 Og teir slógu allar staðirnar rundan um Gē-răr; tí at ótti HARRANS kom uppá teir: og teir rændu allar staðirnar; tí at tað var avbera nógvur herfongur í teimum.

15 Teir slógu eisini fenaðartjøldini, og førdu burtur seyð og kamelar í ríkiligleika, og vendu aftur til Jerusalem.

KAPITUL 15

OG Guðs Andi kom uppá Â-zăr-jăh Ō-dĕd-s son:

2 Og hann fór út at møta Á-să, og segði við hann, Hoyrið tit meg, Á-să, og alt Judah og Benjamin; HARRIN *er* við tykkum, meðan tit veri við honum; og um tit søki hann, hann vil verða funnin av tykkum; men um tit yvirgevi hann, hann vil yvirgeva tykkum.

3 Nú, í eitt langt tíðarskeið *hevur* Ísrael *verið* uttan hin sanna Guð, og uttan ein frálærandi prest, og uttan lóg.

4 Men tá ið teir í síni trongd vendu aftur at HARRANUM Guði Ísraels, og søktu hann, varð hann funnin av teimum.

5 Og í teimum tíðum *var* eingin friður hjá honum sum fór út, ella hjá honum sum kom inn, men miklar nívdir *vóru* uppiá øllum íbúgvum landanna.

6 Og tjóð varð oydd av tjóð, og staður av staði: tí at Guð nívdi teir við øllum mótburði.

7 Verið tit sterkir, tessvegna, og latið ikki tykkara hendur vera veikar: tí at verk tykkara skal verða endurlønt.

8 Og tá ið Á-sá hoyrdi hesi orð, og prophetiið hjá Ō-ded propheti, tók hann mót *til sín,* og koyrdi burt hinar andstyggiligu skurðgudar út úr øllum landi Judah og Benjamins, og út úr staðunum sum hann hevði tikið frá Ē-phră-im fjalli, og endurnýggjaði altar HARRANS, sum *var* frammanfyri forhøll HARRANS.

9 Og hann savnaði alt Judah og Benjamin, og teir fremmandu við teimum úr Ē-phră-im og Mă-năs-sēh, og úr Símeon: tí at teir fullu til hansara burtur úr Ísrael í yvirflóð, tá ið teir sóu at HARRIN Guð hansara *var* við honum.

10 So teir savnaðu seg saman í Jerusalem í tí triðja mánaðinum, í hinum fimtanda ári av ríkjan Á-sá.

11 Og teir ofraðu at HARRANUM hina somu tíð, av herfonginum *sum* teir høvdu ført, sjey hundrað oksar og sjey túsund seyðir.

12 Og teir inngingu inn í ein sáttmála at søkja HARRAN Guð fedra sína við øllum hjarta sínum og við allari sál síni;

13 At hvørsumhelst *ið* vildi ikki søkja HARRAN Guð Ísraels skuldi verða tikin av lívi, hvørt lítil ella stórur, hvørt maður ella kvinna.

14 Og teir svóru HARRANUM við eini harðari rødd, og við rópan, og við lúðrum, og við hornum.

15 Og alt Judah fegnaðist við eiðin: tí at teir høvdu svorið við øllum hjarta sínum, og søkt hann við allari tráan síni; og hann varð funnin av teimum: og HARRIN gav teimum hvílu runt umkring.

16 ¶ Og eisini *viðvíkjandi* Má-ă-chŭh, móður Á-să kongs, hann burtflutti hana frá *at vera* drotning, av tí at hon hevði gjørt ein skurðgud í eini lund: og Á-sá skar niður skurðgud hennara, og muldi *hann,* og brendi *hann* við áarløkin Kī-drŏn.

17 Men tey høgu plássini vórðu ei tikin burtur út úr Ísrael: hóast hetta, hjarta Á-să-s var fullkomið allar dagar hansara.

18 ¶ Og hann førdi inn í hús Guðs lutirnar sum faðir hansara hevði vígt, og sum sjálvur hann hevði vígt, silvur, og gull, og reiðir.

19 Og tað var ikki *meira* kríggj at hinum fimm og tríatiunda ári av ríkan Á-sá.

KAPITUL 16

Í HINUM seks og tríatiunda ári av ríkjan Á-sá kom Bā-ăsj-ă kongur av Ísrael upp ímóti Judah, og bygdi Rá-măh, til tess endamáls at hann ongan mátti lata fara út ella koma inn til Á-sá kongs av Judah.

2 Tá førdi Á-sá út silvur og gull út úr dýrgripa*goymsl*um HARRANS húss og kongshússins, og sendi til Běn-há-dăd-s kongs av Sýriu, sum búði í Damascus, sigandi,

3 *Tað er* eitt bandalag ímillum meg og teg, eins og *tað var* ímillum faðir mín og faðir tín: sí, eg havi sent tær silvur og gull; far, brót títt bandalag við Bā-ăsj-ă kong av Ísrael, at hann má fara avstað frá mær.

4 Og Běn-há-dăd gav gætur at

Á′-să kongi, og sendi høvuðsmenninar av herum sínum ímóti staðum Ísraels; og teir slógu Ĭ′-jŏn, og Dán, og Á′-bĕl-má′-ĭm, og allar goymslustaðir Năph′-tâ-lī-s.

5 Og tað bar á, tá ið Bā-ăsj′-ă hoyrdi *tað,* at hann lætti av at byggja Rá′-măh, og læt arbeiðið hjá sær halda uppat.

6 Tá tók Á′-să kongur alt Judah; og teir bóru burtur steinarnar av Rá′-măh, og timbur tess, við hvørjum Bā-ăsj′-ă bygdi; og hann bygdi við tí Gē′-bă og Miz-pah.

7 ¶ Og á teirri tíð kom Hă-nā′-nī síggjari til Á′-să kongs av Judah, og segði við hann, Av tí at tú hevurt styðjast við kongin av Sýriu, og ikki styðjast við HARRAN Guð tín, tí hevur herliðið hjá Sýriu kongi komist undan út úr hond tíni.

8 Vóru ikki Ê-thĭ-ō′-pĭ-ararnir og Lû-bĭm′-arnir eitt ovurstórt herlið, við sera nógvum vagnum og hestmonnum? tó, av tí at tú studdirst við HARRAN, flýggjaði hann teir inn í hond tína.

9 Tí at eygu HARRANS renna til og frá út gjøgnum alla jørðina, at sýna seg sjálvan sterkan *teirra* vegna, hvørs hjarta *er* fullkomið mótvegis honum. Herí hevurt tú gjørt fávitskuliga: tí skalt tú hiðanífrá hava bardagar.

10 Tá varð Á′-să vreiður við síggjaran, og koyrdi hann í eitt fangahús; tí *hann var* í eini øði við hann uppá grund av hesum *luti*. Og Á′-să kúgaði *sumt* av fólkinum hina somu tíð.

11 ¶ Og sí, gerningar Á′-să-s, fyrstir og síðstir, sí, teir *eru* skrivaðir í bók konganna av Judah og Ísrael.

12 Og Á′-să í tí tríati og níggjunda árinum av ríkjan síni var sjúklaður í fótum sínum, inntil hansara sjúkdómur *var* avbera *mikil:* tó í sínum sjúkdómi søkti hann ikki til HARRANS, men til læknanna.

13 ¶ Og Á′-să svav hjá fedrum sínum, og doyði í hinum ēin og fjørutiunda ári av ríkjan síni.

14 Og teir jarðaðu hann í egnu gravhýsum hansara, sum hann hevði gjørt til sín sjálvs í staði Dávids, og løgdu hann í songina sum var fylt við søtum angilsum og ymsum sløgum *av kryddurtum,* fyribúgvin eftir apotekarans kynstri: og teir gjørdu eina sera mikla brennu fyri hann.

KAPITUL 17

OG Jĕ-hō′-sjâ-phăt, sonur hansara, ríkti í hansara stað, og styrkti seg sjálvan ímóti Ísrael.

2 Og hann staðsetti *her*styrkir í øllum teimum girdu staðunum av Judah, og setti setulið˘ í Judah landi, og í staðunum av Ē′-phrā-ĭm, sum Á′-să, faðir hansara, hevði tikið.

3 Og HARRIN var við Jĕ-hō′-sjâ-phăt-i, av tí at hann gekk í hinum fyrstu vegum faðirs síns Dávids, og søkti ikki innat Bā′-ă-lĭm;

4 Men søkti til *HARRANS* Guðs faðirs síns, og gekk í boðum hans, og ikki eftir gerðum Ísraels.

5 Tí staðfesti HARRIN kongadømið í hansara hond; og alt Judah førdi til Jĕ-hō′-sjâ-phăt-s gávur; og hann hevði ríkidømir og heiður í ríkiligleika.

6 Og hansara hjarta varð lyft upp í vegum HARRANS: harafturat tók hann burt hini høgu pláss og lundirnar út úr Judah.

7 ¶ Eisini í tí triðja árinum av ríkjan síni sendi hann til prinsa sína, *enntá* til Bĕn′-hail-s, og til Ó-bă-dī′-ăh, og til Zĕch-ăr′-jăh, og til Nĕth-á′-nēel-s, og til Mī-chāĭ′-ăh, at frálæra í staðum Judah.

8 Og við teimum *sendi hann* Levitar, *enntá* Sjĕm-āĭ′-ăh, og Nĕthăn′-jăh, og Zĕb-ă-dī′-ăh, og Ás′-ăhĕl, og Sjĕ-mĭ′-ră-mōth, og Jĕ-hó′-

nă-thăn, og Ăd-ō-nī´-jăh, og Tó-bī´-jăh, og Tŏb-ăd-ō-nī´-jăh, Levitar; og við teimum Ê-lî-sjá´-mă og Jĕ-hór´-ăm, prestar.

9 Og teir frálærdu í Judah, og *høvdu* bók lógar HARRANS við sær, og fóru umkring út gjøgnum allar staðirnar av Judah, og lærdu fólkið.

10 ¶ Og ótti HARRANS fell uppá øll kongadømini av londunum sum *vóru* rundan um Judah, so at teir førdu einkið kríggj ímóti Jĕ-hō´-sjâ-phăt-i.

11 Eisini *summir* av Philistunum førdu Jĕ-hō´-sjâ-phăt-i gávur, og íkast silvur; og Arabararnir førdu honum fylgir, sjey túsund og sjey hundrað veðrar, og sjey túsund og sjey hundrað havrar.

12 ¶ Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt vaks mikil ovurhondsligani; og hann bygdi í Judah borgir, og goymslu-staðir.

13 Og hann hevði nógvan gerning í staðum Judah: og kríggsmenninir, mektigir reystsemis menn, *vóru* í Jerusalem.

14 Og hetta *eru* tølini á teimum samsvarandi við húsið hjá fedrum teirra: Av Judah, høvuðsmenninir av túsundum; Ăd´-nâh hin fremsti, og við honum mektigir reystsemis menn, trý hundrað túsund.

15 Og næstur mót honum *var* Jĕ-hó´-hă-năn høvuðsmaður, og við honum tvey hundrað og fýrsinstjúgu túsund.

16 Og næst honum *var* Á-măsī´-ăh Zĭch´-rī-s sonur, hvør viljugani ofraði seg at HARRANUM; og við honum tvey hundrað túsund mektigir reystsemis menn.

17 Og av Benjamin; Ĕ-lī´-ă-dă, ein mektigur reystsemis maður, og við honum vápnaðir menn við boga og skjøldri, tvey hundrað túsund.

18 Og næst honum *var* Jĕ-hō´-ză-băd, og við honum eitt hundrað og fýrsinstjúgu túsund klárt búnir til kríggið.

19 Hesir vartaðu um kong, umframt *teir* sum kongur setti í teir girdu staðirnar út gjøgnum alt Judah.

KAPITUL 18

NÚ, Jĕ-hō´-sjâ-phăt hevði ríkdómar og heiður í ríkiligleika, og sameinti mágskap við Áhab.

2 Og aftaná *ávís* ár fór hann oman til Áhabs til Să-mâr´-ī-ŭ. Og Áhab drap seyð og oksar til hansara í ríkiligleika, og til fólkið sum *hann hevði* hjá sær, og yvirtalaði hann at fara niðan *við sær* til Rá´-möth-gī´-lĕ-ăd.

3 Og Áhab kongur av Ísrael segði við Jĕ-hō´-sjâ-phăt kong av Judah, Vilt tú fara við mær til Rá´-möth-gī´-lĕ-ăd? Og hann svaraði honum, Eg *eri* sum tú *ert*, og fólk mítt sum fólk títt; og *vit vilja vera* við tær í kríggnum.

4 ¶ Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði við kongin av Ísrael, Fregna, eg biði teg, hjá orði HARRANS í dag.

5 Tí savnaði kongurin av Ísrael saman av prophetum fýra hundrað menn, og segði við teir, Skulu vit fara til Rá´-möth-gī´-lĕ-ăd til orrustu, ella skal eg lata vera? Og teir søgdu, Far upp; tí at Guð vil flýggja *tað* inn í kongsins hond.

6 Men Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði, *Er* ikki her ein prophetur HARRANS umframt, at vit máttu fregnað av honum?

7 Og kongurin av Ísrael segði við Jĕ-hó´-sjâ-phăt, *Tað er* enn ĕin maður, við hvørjum vit mega fregna av HARRANUM: men eg hati hann; tí hann propheteraði aldri gott at mær, men altíð ilt: hin sami *er* Mī-cāí´-ăh, sonur Ĭm´-lă. Og Jĕ-hō´-sjâ-phăt segði, Lat ikki kong siga so.

8 Og kongurin av Ísrael kallaði ĕin *av* yvirmonnum *sínum*, og segði, Heinta snarliga Mī-cāí´-ăh, son Ĭm´-lă.

9 Og kongurin av Ísrael og Jĕhŏ´-sjâ-phăt kongur av Judah sótu hvør av teimum á hásæti sínum, klæddir í skikkjum *sínum,* og teir sótu í einum tómum plássi við inngongdina av portrinum av Sămâr´-ĭ-ŭ; og allir prophetarnir prophetera̋u frammi fyri teimum.

10 Og Zĕd-ĕ-kī´-ăh Chĕ-ná´-ă-năh sonur hevði gjørt sær hornˇ av jarni, og segði, Svá sigur HARRIN, Við hesumˇ skalt tú trýsta Sýriu, inntil teir verði upptærdir.

11 Og allir prophetarnir prophetera̋u soleiðis, sigandi, Far upp til Rá´-mŏth-gī´-lĕ-ăd, og framgakk: tí at HARRIN skal flýggja *tað* inn í hond kongs.

12 Og sendiboðin, sum fór at kalla Mī-cāĭ´-ăh, talaði til hansara, sigandi, Sí, orð prophetanna *kunngera* gott fyri kongi ēinstemt; lat orð títt tessvegna, eg biði teg, vera líka *sum* ēitt av teirra, og tali tú gott.

13 Og Mī-cāĭ´-ăh segði, *Sum* HARRIN livir, enntá hvat *ið* Guð mín sigur, tað vil eg tala.

14 Og tá ið hann var komin til kongs, segði kongur við hann, Mī-cāĭ´-ăh, skulu vit fara til Rá´-mŏth-gī´-lĕ-ăd til orrustu, ella skal eg lata vera? Og hann segði, Farið tit upp, og framgangið, og teir skulu verða flýggjaðir inn í hond tykkara.

15 Og kongur segði til hansara, Hvussu mangar ferðir skal eg eiðsvørja teg, at tú sigi einkið uttan sannleikan til mín í navni HARRANS?

16 Tá segði hann, Eg sá allan Ísrael spjaddan uppiá fjøllunum, sum seyðir ið ongan hirða hava: og HARRIN segði, Hesir hava ongan meistara; lat teir venda aftur *tessvegna,* hvør maður til húss síns í friði.

17 Og kongurin av Ísrael segði til Jĕ-hŏ´-sjâ-phăt-s, Segði eg tær ikki, *at* hann vildi ikki prophetera gott at mær, men ilt?

18 Aftur segði hann, Tessvegna hoyrið HARRANS orð; eg sá HARRAN, sitandi uppiá hásæti sínum, og alt herlið himins, standandi til høgru handar hans og *til* hansara vinstru.

19 Og HARRIN segði, Hvør skal lokka Áhab kong av Ísrael, at hann má fara upp og falla í Rá´-mŏth-gī´-lĕ-ăd? Og ēin talaði, sigandi eftir hesum háttarlagi, og ein annar, sigandi eftir hasum háttarlagi.

20 Tá kom tað út ein andi, og stóð frammi fyri HARRANUM, og segði, Eg vil lokka hann. Og HARRIN segði við hann, Hvarvið?

21 Og hann segði, Eg vil fara út, og vera ein lúgvandi andi í munninum á øllum prophetum hansara. Og *HARRIN* segði, Tú skalt lokka *hann,* og tú skalt eisini sigra: far út, og ger *enntá* so.

22 Nú tessvegna, sí, HARRIN hevur lagt ein lúgvandi anda í munnin á hesum prophetum tínum, og HARRIN hevur talað ilt ímóti tær.

23 Tá kom Zĕd-ĕ-kī´-ăh Chĕ-ná´-ă-năh sonur nær, og sló Mī-cāĭ´-ăh uppá kinnina, og segði, Hvønn veg fór Andi HARRANS frá mær at tala við teg?

24 Og Mī-cāĭ´-ăh segði, Sí, tú skalt síggja á tí degi tá ið tú skalt fara inn í eitt innara kamar at fjala teg.

25 Tá segði kongurin av Ísrael, Takið tit Mī-cāĭ´-ăh, og førið hann aftur til Ámons, stjórnara staðarins, og til Jóasj, sonar kongsins;

26 Og sigið, Svá sigur kongur, Koyrið henda *felagan* í fongslið, og føðið hann við kvalarbreyði og við kvalarvatni, inntil eg komi aftur í friði.

27 Og Mī-cāĭ´-ăh segði, Um tú vissuliga vendi aftur í friði, *so* hevur ikki HARRIN talað viðˇ mær. Og hann segði, Gevið gætur, alt tit fólk.

28 So kongurin av Ísrael og Jē-hō´-sjâ-phăt, kongur Judah, fóru upp til Rá´-mŏth-gī´-lē-ăd.
29 Og kongurin av Ísrael segði við Jē-hō´-sjâ-phăt, Eg vil dulbúgva meg, og vil fara til bardagan; men far tú í skikkjur tínar. So kongurin av Ísrael dulbúði seg; og teir fóru til bardagan.
30 Nú, kongurin av Sýriu hevði boðið høvuðsmonnunum av vagnunum, sum *vóru* við honum, sigandi, Berjist tit ikki við lítlan ella miklan, uttan einans við kongin av Ísrael.
31 Og tað bar á, tá ið høvuðsmenninir av vagnunum sóu Jē-hō´-sjâ-phăt, at teir søgdu, Tað *er* kongurin av Ísrael. Teir tessvegna umringaðust um hann til at berjast: men Jē-hō´-sjâ-phăt rópaði út, og HARRIN hjálpti honum; og Guð rørdi teir *til at fara avstað* frá honum.
32 Tí at tað bar á, at tá ið høvuðsmenninir av vagnunum varnaðust, at tað var ikki kongurin av Ísrael, vendu teir tilbakar aftur frá at elta hann.
33 Og ein *ávísur* maður spenti ein boga við ein vága, og sló kongin av Ísrael ímillum brynjuskoytini: tí segði hann til vagnmann sín, Vend hond tíni, at tú mást bera meg út úr herliðinum; tí at eg eri særdur.
34 Og bardagin tók til tann dagin: hvussu enn er, kongurin av Ísrael styðjaði *seg* upp í vagni *sínum* ímóti Sýriulendingunum inntil kvøldið: og umleið tíðina av niðurfaring sólarinnar doyði hann.

KAPITUL 19

OG Jē-hō´-sjâ-phăt kongur av Judah vendi aftur til húss síns í friði til Jerusalem.
2 Og Jehu Hă-nā´-nī-s sonur síggjari fór út at møta honum, og segði til Jē-hō´-sjâ-phăt-s kongs, Skuldirt tú hjálpt hinum ógudiligu, og elskað teir sum hata HARRAN? tí *er* vreiði uppiá tær frammi fyri HARRANUM ífrá.
3 Hóast hetta, tað eru góðir lutir funnir í tær, í at tú hevurt tikið burtur lundirnar burtur úr landinum, og hevurt fyribúgvið títt hjarta at søkja Guð.
4 Og Jē-hō´-sjâ-phăt dvaldist í Jerusalem: og hann fór út aftur ígjøgnum fólkið frá Bēēr´-sjē-bū til Ē´-phră-ĭm fjalls, og førdi teir aftur at HARRANUM Guði fedra sína.
5 ¶ Og hann setti dómarar í landinum út gjøgnum allar teir girdu staðirnar av Judah, stað um stað,
6 Og segði til dómaranna, Ansið eftir hvat tit geri: tí at tit døma ikki fyri mann, men fyri HARRAN, sum *er* við tykkum í dóminum.
7 Hvørsvegna nú, latið ótta HARRANS vera uppiá tykkum; ansið eftir og gerið *tað:* tí at *tað finst* eingin misgerð hjá HARRANUM Guði várum, ella meting av persónum, ella taking av gávum.
8 ¶ Harafturat, í Jerusalem setti Jē-hō´-sjâ-phăt av Levitunum, og *av* prestunum, og av teimum fremstu av fedrum Ísraels, til dóm HARRANS, og til deilumálevnir, tá ið teir komu aftur til Jerusalem.
9 Og hann álegði teimum, sigandi, Svá skulu tit gera í ótta HARRANS, trúfastligani, og við einum fullkomnum hjarta.
10 Og hvør søk sumhelst, *ið* skal koma til tykkara av brøðrum tykkara, sum búgva í staðum sínum, ímillum blóð og blóð, ímillum lóg og boð, ásetingar og dómar, tit skulu enntá ávara teir, at teir misbrótist ikki ímóti HARRANUM, og *so* vreiði komi

uppá tykkum, og uppá brøður tykkara: hetta gerið, og tit skulu ikki misbrótast.

11 Og sí, Ă-măr´-jăh, hin fremsti presturin, *er* yvir tykkum í øllum málevnum HARRANS; og Zĕbă-dī´-ăh Ísj´-mâ-ĕl-s sonur stjórnari av húsi Judah, til øll málevnir kongs: eisini Levitarnir *skulu vera* yvirmenn frammi fyri tykkum. Farið mótsamligani at, og HARRIN skal vera við tí góða.

KAPITUL 20

TAÐ bar á eftir hetta eisini, *at* børn Móabs, og børn Ammons, og við teimum *aðrir* umframt Ammonitarnar, komu ímóti Jĕ-hō´-sjâ-p̲hăt til orrustu.

2 Tá komu tað summir sum taldu Jĕ-hō´-sjâ-p̲hăt-i, sigandi, Tað kemur ein mikil fjøld ímóti tær frá handan havsins hesumegin Sýriu; og sí, teir *veri* í Hāz´-ă-zŏntá´-mâr, sum *er* Ĕn-gĕ´-dī.

3 Og Jĕ-hō´-sjâ-p̲hăt óttaðist, og innstillaði seg til at søkja HARRAN, og lýsti eina føstu út gjøgnum alt Judah.

4 Og Judah savnaðu seg sjálvar saman, til at umbiðja *hjálp* av HARRANUM: enntá út úr øllum staðunum av Judah komu teir at søkja HARRAN.

5 ¶ Og Jĕ-hō´-sjâ-p̲hăt stóð í samkomu Judah og Jerusalems, í húsi HARRANS, frammanfyri tí nýggja forgarðinum,

6 Og segði, O HARRI Guð fedra vára, *ert* ikki tú Guð í himni? og stjórnart *ikki* tú yvir øllum kongadømum hinna heidnu? og í tíni hond, *er har ikki* kraft og máttur, so at eingin er førur fyri at standa ímóti tær?

7 *Ert* ikki tú Guð vár, *hvør* rakst út íbúgvar hesa lands undan fólki tínum Ísrael, og gavst tað til sáðs Ábrahams, vinar tíns, um ævir?

8 Og teir dvaldust harí, og hava bygt tær ein halgidóm harí til navns tíns, sigandi,

9 Um, *tá ið* ilt kemur omanyvir okkum, *eins og* svørðið, dómur, ella drepsótt, ella hungursneyð, vit standa frammanfyri hesum húsi, og í nærveru tíni, (tí at navn títt *er* í hesum húsi,) og rópa á teg í nívd okkara, tá vilt tú hoyra og hjálpa.

10 Og nú, sí, børn Ammons og Móabs og Sē´-īr fjall, hvørjar tú ikki vildirt lata Ísrael loypa á, tá ið teir komu út úr Egyptalandi, men teir vendu frá teimum, og oyddu teir ikki;

11 Síggj, *eg sigi, hvussu* teir endurgjalda okkum, at koma at kasta okkum út úr ogn tíni, sum tú hevurt givið okkum at arva.

12 O Guð vár, vilt tú ikki døma teir? tí at vit hava ongan mátt ímóti hesum mikla flokki, sum kemur ímóti okkum; eiheldur vita vit hvat gera *eigur:* men okkara eygu *eru* uppá teg.

13 Og alt Judah stóð frammi fyri HARRANUM, við hinum smáu sínum, konum sínum, og børnum sínum.

14 ¶ Tá uppá Já-há´-zī-ĕl Zĕch-ăr´-jăh son, Bĕ-nâ´-ăh sonar, Jē´-ĕl-s sonar, Măt-tă-nī´-ăh sonar, ein Levit av sonum Á´-săp̲h-s, kom Andi HARRANS í miðjari samkomuni;

15 Og hann segði, Lýðið tit *á*, alt Judah, og tit íbúgvar av Jerusalem, og tú Jĕ-hō´-sjâ-p̲hăt kongur, Svá sigur HARRIN við tykkum, Verið ikki ræddir ella mismótigir uppá grund av hesi miklu fjøld; tí at bardagin *er* ikki tykkara, men Guðs.

16 Í morgin farið tit oman ímóti teimum: sí, teir koma upp við forberg Zīz; og tit skulu finna teir við endan av áarløkinum, frammanfyri Jĕ´-rū-ĕl-s oyðu.

17 Tykkum skal ikki *tørvast* at

berjast í hesum *bardaga:* innstillið tykkum, standið tit *stillir,* og síggið frelsu HARRANS hjá″ tykkum, O Judah og Jerusalem: óttist ikki, ella verið mismótigir; í morgin farið út ímóti teimum: tí at HARRIN *vil vera* við tykkum.

18 Og Jë-hō´-sjâ-phăt boygdi sítt høvur við andliti *sínum* til jarðarinnar: og alt Judah og íbúgvarnir av Jerusalem fullu frammi fyri HARRANUM, tilbiðjandi HARRAN.

19 Og Levitarnir, av børnum Kō-hăth-īt´-anna, og av børnum Kôr-hīt´-anna, stóðu upp at prísa HARRANUM Guði Ísraels við eini harðari rødd til hæddar.

20 ¶ Og teir risu snimma um morgunin, og fóru fram inn í Tĕ´-kô-ă oyðu: og sum teir fóru fram, stóð Jë-hō´-sjâ-phăt og segði, Hoyrið meg, O Judah, og tit íbúgvar av Jerusalem; Trúgvið á HARRAN Guð tykkara, so skulu tit vera grundfestir; trúgvið prophetum hansara, so skulu tit framganga.

21 Og tá ið hann hevði ráðført *seg* við fólkið, útnevndi hann sangarar at HARRANUM, og sum skuldu prísa vakurleikanum av heilagleika, sum teir fóru út frammanfyri herinum, og at siga, Prísið HARRANUM; tí hansara miskunn *varir* um ævir.

22 ¶ Og tá ið teir byrjaðu at syngja og at prísa, setti HARRIN loynisetingar ímóti børnum Ammons, Móab, og Sĕ´-īr fjalli, sum vóru komnir ímóti Judah; og teir vórðu slignir.

23 Tí at Ammons børn og Móab stóðu upp ímóti íbúgvum Sĕ´-īr fjalls, aldeilis at vega og oyða *teir:* og tá ið teir høvdu gjørt ein enda á íbúgvum Sĕ´-īr-s, hjálpti hvør at oyða annan.

24 Og tá ið Judah kom ímóti varðtorninum í oyðuni, litu teir at fjøldini, og sí, teir *vóru* deyðir kroppar, falnir til jarðarinnar, og eingin komst undan.

25 Og tá ið Jë-hō´-sjâ-phăt og hansara fólk komu at taka burtur herfongin av teimum, funnu teir teirra millum í ríkiligleika bæði ríkidømir hjá″ teimum deyðu kroppunum, og dýrmætar skartgripir, sum teir skræddu av til sín sjálvs, meir enn teir kundu bera burtur: og teir vóru tríggjar dagar um at savna av herfonginum, hann var so nógvur.

26 ¶ Og á tí fjórða deginum savnaðu teir seg saman í Bĕ-rá-chăh dalinum; tí at har vælsignaðu teir HARRAN: navnið á tí sama plássinum tessvegna varð kallað, Bĕ-rá´-chăh dalur, at hesum degi.

27 Tá vendu teir aftur, hvør maður av Judah og Jerusalem, og Jë-hō´-sjâ-phăt í teirra frammistøðu, at fara aftur til Jerusalem við frøi; tí at HARRIN hevði fingið teir at fegnast yvir teirra figgindum.

28 Og teir komu til Jerusalem við psaltrum og hørpum og lúðrum at húsi HARRANS.

29 Og óttin fyri Guði var á øllum kongadømunum av *teimum* londunum, tá ið teir høvdu hoyrt, at HARRIN bardist ímóti figgindum Ísraels.

30 So ríkið hjá Jë-hō´-sjâ-phăt-i var kvirt: tí at Guð hansara gav honum hvílu runt umkring.

31 ¶ Og Jë-hō´-sjâ-phăt ríkti yvir Judah: *hann var* tríati og fimm ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti tjúgu og fimm ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Á´-zû-băh Sjïl´-hī-s dóttir.

32 Og hann gekk í vegi Á´-să, faðirs síns, og veik ikki frá honum, gerandi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS.

33 Hvussu enn er, tey høgu plássini vórðu ei tikin burtur: tí at sum enn *var* hevði fólkið ikki fyribúgvið hjørtu síni at Guði fedra sína.

34 Nú, restin av gerningum Jē-hō´-sjâ-phăt-s, fyrstir og síðstir, sí, teir *eru* skrivaðir í bók Jehu-s Hă-nā´-nī-s sonar, sum *er* nevndur í bók konga Ísraels.

35 ¶ Og eftir hetta sameinti Jē-hō´-sjâ-phăt kongur av Judah seg við Á-hă-zī´-ăh kong av Ísrael, sum gjørdi sera vondliga:

36 Og hann sameinti seg við hann at gera skip˘ til at fara til Tarsjisj: og teir gjørdu skipini í Ē´-zī-ŏn-gē´-bĕr.

37 Tá propheteraði Êl-ī-ē´-zĕr Dó´-dă-văh sonur úr Mă-rē´-sjâh ímóti Jē-hō´-sjâ-phăt-i, sigandi, Av tí at tú hevurt sameinað teg við Á-hă-zī´-ăh, hevur HARRIN brotið verkini hjá tær. Og skipini vórðu brotin, at tey vóru ikki før fyri at fara til Tarsjisj.

KAPITUL 21

NÚ, Jē-hō´-sjâ-phăt svav hjá fedrum sínum, og varð jarðaður hjá fedrum sínum í staði Dávids. Og Jē-hór´-ăm, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

2 Og hann hevði brøður — synir Jē-hō´-sjâ-phăt-s, Â-zăr´-jăh, og Jē´-hĭ-ĕl, og Zĕch-ăr´-jăh, og Â-zăr´-jăh, og Michael, og Sjĕph-ăt´-jăh: allir hesir *vóru* synir Jē-hō´-sjâ-phăt-s kongs av Ísrael.

3 Og teirra faðir gav teimum miklar gávur av silvuri, og av gulli, og av dýrabærum tingum, við girdum staðum í Judah: men kongadømið gav hann til Jē-hór´-ăm-s; av tí at hann *var* hin fyrstiføddi.

4 Nú, tá ið Jē-hór´-ăm var risin upp til kongadømis faðirs síns, styrkti hann seg, og vá allar brøður sínar við svørðinum, og *ymsar* eisini av prinsum Ísraels.

5 ¶ Jē-hór´-ăm *var* tríati og tvey ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti átta ár í Jerusalem.

6 Og hann gekk í vegi konganna av Ísrael, líka sum gjørdi Áhabs hús: tí at hann hevði dóttur Áhabs til ektakonu: og hann virkaði *tað sum* ilt *var* í eygum HARRANS.

7 Hvussu enn er, HARRIN vildi ikki oyðileggja hús Dávids, uppá grund av sáttmálanum sum hann hevði gjørt við Dávid, og eftirsum *at* hann fyrijáttaði at geva eitt ljós til hansara og til sona hans um ævir.

8 ¶ Á hansara døgum frástoyttu Ê-dóm-ĭt´-arnir frá *at vera* undir harradømi Judah, og gjørdu sær kong.

9 Tá fór Jē-hór´-ăm fram við prinsum sínum, og øllum vagnum sínum við sær: og hann reis upp um nátt*ina*, og sló Ê-dóm-ĭt´-arnar sum umringaðu hann inn, og høvuðsmenn vagnanna.

10 So Ê-dóm-ĭt´-arnir frástoyttu frá *at vera* undir hond Judah at hesum degi. Ta somu tíð *eisini* frástoyttu Lĭb´-năh frá *at vera* undir hond hansara; av tí at hann hevði yvirgivið HARRAN Guð fedra sína.

11 Harafturat gjørdi hann høg pláss í fjøllunum av Judah, og voldi íbúgvunum av Jerusalem at fremja hordóm, og noyddi Judah *til tess*.

12 ¶ Og tað kom eitt skriv til hansara frá Ê-lī´-jăh propheti, sigandi, Svá sigur HARRIN Guð Dávids, faðirs tíns, Av tí at tú ei hevurt gingið í vegum Jē-hō´-sjâ-phăt-s, faðirs tíns, ella í vegum Á´-să kongs av Judah,

13 Men hevurt gingið í vegi konganna av Ísrael, og hevurt fingið Judah og íbúgvarnar av Jerusalem at fara horandi, líkt við hordómar Áhabs húss, og eisini hevurt vigið brøður tínar av húsi faðirs tíns, *sum vóru* mætari enn tú sjálvur:

14 Sí, við eini miklari plágu vil HARRIN sláa fólk títt, og børn tíni, og konur tínar, og alt góðs títt:

15 Og tú *skalt hava* mikla sjúku við^ sjúkdómi av innvølum tínum, inntil tínir innvølir detti út uppá grund av sjúkuni dag um dag.

16 ¶ Harafturat østi HARRIN upp ímóti Jē-hór´-ăm-i anda Philistanna, og Arabaranna, sum *vóru* nær Ê-thī-ō´-pī-arunum:

17 Og teir komu upp inn í Judah, og brutu inn í tað, og bóru burtur alt *fíggjar*evnið sum varð funnið í húsi kongsins, og synir hans eisini, og konur hansara; so at tað var aldri ein sonur eftirlatin honum, uttan Jē-hó´-ă-hăz, hin yngsti av sonum hansara.

18 ¶ Og eftir alt hetta sló HARRIN hann í innvølir hansara við einum ólekiligum sjúkdómi.

19 Og tað bar á, at í framlíðing tíðarinnar, eftir endan á tveimum árum, fullu innvølir hansara út uppá grund av sjúku hansara: so hann doyði av svárum sjúkdómum. Og hansara fólk gjørdi onga brennu til hansara, líka *sum* brennuna hjá fedrum hansara.

20 Tríati og tvey ára gamalur var hann tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti í Jerusalem átta ár, og fór avstað uttan at verða tráaður. Hvussu enn er, teir jarðaðu hann í staði Dávids, men ikki í gravhýsum konganna.

KAPITUL 22

OG íbúgvarnir av Jerusalem gjørdu Ă-hă-zī´-ăh, yngsta son hansara, *til* kong í hansara stað: tí at liðið av monnum, sum kom við Arabarunum til leirin, hevði vigið allar teir elstu. So Ă-hă-zī´-ăh Jē-hór´-ăm-s sonur kongur av Judah ríkti.

2 Fjøruti og tvey ára gamalur *var* Ă-hă-zī´-ăh tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti ēitt ár í Jerusalem. Navn móður hansara eisini *var* Ăth-ăl´-jăh Omrī-s dóttir.

3 Hann eisini gekk í vegum Áhabs húss: tí at móðir hansara var ráðgevi hansara *í* at gera vondliga.

4 Hvørsvegna hann gjørdi ilt í eygsjón HARRANS líka *sum* hús Áhabs: tí at teir vóru ráðgevar hans eftir deyða faðirs hans, til oyðing hans.

5 ¶ Hann gekk eisini eftir ráði teirra, og fór við Jē-hór´-ăm Áhabs syni, Ísraels kongi, til kríggj ímóti Hă´-ză-ĕl kongi av Sýriu í Rá´-mōth-gī´-lē-ăd: og Sýriulendingarnir slógu Jóram.

6 Og hann vendi aftur at verða grøddur í Jĕz´-rē℮l, uppá grund av sárunum sum vórðu givin honum í Rá´-măh, tá ið hann bardist við Hă´-ză-ĕl kong av Sýriu. Og Â-zăr´-jăh Jē-hór´-ăm-s sonur, Judah kongur, fór oman at hitta Jē-hór´-ăm Áhabs son í Jĕz´-rē℮l, av tí at hann var sjúkur.

7 Og oyðilegging Â-zăr´-jăh var av Guði, við at koma til Jórams: tí at tá ið hann var komin, fór hann út við Jē-hór´-ăm-i ímóti Jehu Nimsjī-s syni, hvønn HARRIN hevði salvað til at skera av Áhabs hús.

8 Og tað bar á, at tá ið Jehu útinti dóm omanyvir hús Áhabs, og fann prinsarnar av Judah, og synirnar hjá brøðrum Ă-hă-zī´-ăh, sum tæntu fyri Ă-hă-zī´-ăh, vá hann teir.

9 Og hann søkti Ă-hă-zī´-ăh: og teir fangaðu hann, (tí hann var fjaldur í Să-mâr´-ī-ū,) og førdu hann til Jehu-s: og tá ið teir høvdu vigið hann, jarðaðu teir hann: Av tí at, søgdu teir, hann *er* sonur Jē-hō´-sjâ-phăt-s, sum søkti HARRAN við øllum hjarta sínum. So Ă-hă-zī´-ăh hús hevði ongan mátt at halda støðugt kongadømið.

10 ¶ Men tá ið Ăth-ăl´-jăh, móðir Ă-hă-zī´-ăh, sá, at sonur hennara

var deyður, reistist hon og oyddi alt hitt kongliga sáð av húsi Judah.

11 Men Jē-hô-sjăb'-ē-ăth, dóttir kongs, tók Jó'-ăsj Ă-hă-zī'-ăh son, og stjól hann burturúr sonum kongsins, sum vórðu vignir, og koyrdi hann og hansara fostru í eitt svøvnkamar. So Jē-hô-sjăb'-ē-ăth, dóttir Jē-hór'-ăm-s kongs, kona Jē-hŏĭ'-ă-dă prests, (tí at hon var systir Ă-hă-zī'-ăh,) fjaldi hann fyri Ăth-ăl'-jūh, so at hon vó hann ikki.

12 Og hann var hjá teimum, fjaldur í húsi Guðs seks ár: og Ăth-ăl'-jăh ríkti yvir landinum.

KAPITUL 23

OG í tí sjeynda árinum styrkti Jē-hŏĭ'-ă-dă seg sjálvan, og tók høvuðsmenninar av hundraðum, Â-zăr'-jăh Jē-ró'-hăm-s son, og Ísj'-mâ-ēl Jē-hó'-hă-năn-s son, og Â-zăr'-jăh Ō'-bēd-s son, og Mā-ă-sēj'-ăh Ă-dâĭ'-ăh son, og Ē-lĭ'-sjă-phăt Zĭch'-rī-s son, inn í sáttmála við seg.

2 Og teir fóru umkring í Judah, og savnaðu Levitarnar út úr øllum staðunum av Judah, og teir fremstu av fedrum Ísraels, og teir komu til Jerusalem.

3 Og øll samkoman gjørdi ein sáttmála við kongin í húsi Guðs. Og hann segði við teir, Sí, kongssonurin skal ríkja, eins og HARRIN hevur sagt um synir Dávids.

4 Hetta *er* tað ting sum tit skulu gera; Ein triðjingspartur av tykkum, farandi inn á sabbatinum, av prestunum og av Levitunum, *skulu vera* duravørðir av hurðunum;

5 Og ein triðjingspartur *skal vera* við kongshúsið; og ein triðjingspartur við grundvallar-portrið: og alt fólkið *skal vera* í forgørðum HARRANS húss.

6 Men lat ongan koma inn í hús HARRANS, uttan prestarnir, og teir sum tæna av Levitunum; teir skulu fara inn, tí at teir *eru* heilagir: men alt fólkið skal halda varðhald HARRANS.

7 Og Levitarnir skulu kringfara kong runt íkring, hvør maður við vápnum sínum í hond síni; og hvørsumhelst *annarið* kemur inn í húsið, hann skal verða tikin av lívi: men verðið tit hjá kongi tá ið hann kemur inn, og tá ið hann fer út.

8 So Levitarnir og alt Judah gjørdu samsvarandi við allar lutir sum Jē-hŏĭ'-ă-dă prestur hevði áboðið, og tóku hvør maður sínar menn sum áttu at koma inn á sabbatinum, við teimum ið áttu at fara *út* á sabbatinum: tí at Jē-hŏĭ'-ă-dă prestur sendi ikki skiftini avstað.

9 Harafturat handaði Jē-hŏĭ'-ă-dă prestur til høvuðsmenninar av hundraðum spjótˇ, og smáskildir, og skjøldrar, sum *høvdu verið* Dávids kongs, sum *vóru* í húsi Guðs.

10 Og hann setti alt fólkið, hvønn mann, havandi vápn sítt í hond síni, frá høgru síðuni av templinum til vinstru síðuna av templinum, yvireftir við altarið og templið, við kongin runt umkring.

11 Tá førdu teir út kongssonin, og settu uppá hann krúnuna, og *góvu honum* vitnisburðin, og gjørdu hann *til* kong. Og Jē-hŏĭ'-ă-dă og synir hansara salvaðu hann, og søgdu, Guð varði kong.

12 ¶ Nú, tá ið Ăth-ăl'-jăh hoyrdi gangin av fólkinum, rennandi og prísandi kongi, kom hon til fólkið inn í hús HARRANS:

13 Og hon hugdi, og sí, kongur stóð við súlu sína við inngongdina, og prinsarnir og lúðrarnir hjá" kongi: og alt fólk landsins fegnaðist, og ljóðaði við lúðrum, eisini sangararnir við tónleiksljóðførum, og slíkir sum frálærdu

at syngja prís. Tá skræddi Ăth-ăl´-jăh klæðir síni, og segði, Hásvik, Hásvik.

14 Tá førdi Jĕ-hōĭ´-ă-dă prestur út høvuðsmenninar av hundraðum, sum vóru settir yvir herliðinum, og segði við teir, Fáið hana fram út úr rekkjunum: og hvørið so fylgir henni, lat hann verða vignan við svørðinum. Tí at presturin segði, Vegið hana ikki í húsi HARRANS.

15 So teir løgdu hendur á hana; og tá ið hon var komin til inngongdina av hests-portrinum við kongshúsið, vógu teir hana har.

16 ¶ Og Jĕ-hōĭ´-ă-dă gjørdi ein sáttmála ímillum seg, og ímillum alt fólkið, og ímillum kong, at teir skuldu vera fólk HARRANS.

17 Tá fór alt fólkið til húsar Bā´-ăl-s, og brutu tað niður, og brutu altør hansara og myndir hansara í stykkir, og vógu Măt´-tăn, prest Bā´-ăl-s, frammanfyri altarunum.

18 Eisini útnevndi Jĕ-hōĭ´-ă-dă embætini av húsi HARRANS viðˇ hendi prestanna, Levitanna, hvørjar Dávid hevði deilt út í húsi HARRANS, til at ofra brennioffurˇ HARRANS, eins og skrivað *stendur* í lóg Mósesar, við fagnan og við synging, *eins og tað varð fyriskipað* av Dávidi.

19 Og hann setti duravørðir við portrini av húsi HARRANS, at eingin, *sum var* óreinur í nøkrum tingi, skuldi innfara.

20 Og hann tók høvuðsmenninar av hundraðum, og aðalsmenninar, og stjórnarar fólksins, og alt fólk landsins, og førdi oman kong frá húsi HARRANS: og teir komu ígjøgnum tað høga portrið inn í kongshúsið, og settu kong uppá hásæti kongadømisins.

21 Og alt fólk landsins fegnaðist: og staðurin var kvirrur, eftir at teir høvdu vigið Ăth-ăl´-jŭh við svørðinum.

KAPITUL 24

JÓ´-ĂSJ *var* sjey ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti fýrati ár í Jerusalem. Navn móður hansara eisini *var* Zĭ´-bĭ-ăh úr Bēēr´-sjē-bŭ.

2 Og Jó´-ăsj gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, allar dagar Jĕ-hōĭ´-ă-dă prests.

3 Og Jĕ-hōĭ´-ă-dă tók til hansara tvær konur; og hann gat synir og døtur.

4 ¶ Og tað bar á eftir hetta, *at* Jó´-ăsj var hugaður at umvæla hús HARRANS.

5 Og hann savnaði saman prestarnar og Levitarnar, og segði til teirra, Farið út at staðunum av Judah, og savnið av øllum Ísrael pening at umvæla hús Guðs tykkara frá ári til árs, og síggið til at tit skundi málið. Hvussu enn er, Levitarnir skundaðu *tað* ikki.

6 Og kongur kallaði eftir Jĕ-hōĭ´-ă-dă tí fremsta, og segði við hann, Hví hevurt tú ikki kravt av Levitunum at føra inn úr Judah og úr Jerusalem innsavningina, *samsvarandi við ábjóðingina* hjá Mósesi, tænara HARRANS, og hjá samkomu Ísraels, til vitnisburðartabernaklið?

7 Tí at synirnir hjá Ăth-ăl´-jŭh, hasi vondu kvinnuni, høvdu brotið inn *í* hús Guðs; og eisini øll tey vígdu tingini av húsi HARRANS veittu teir uppá Bā´-ă-lĭm.

8 Og við boð kongs gjørdu teir eina kistu, og settu hana uttanfyri við portrið av HARRANS húsi.

9 Og teir gjørdu eina kunngerð ígjøgnum Judah og Jerusalem, at føra inn til HARRANS innsavningina, *sum* Móses, tænari Guðs, *legði* uppá Ísrael í oyðuni.

10 Og allir prinsarnir og alt fólkið fegnaðust, og førdu inn, og kastaðu inn í kistuna, inntil teir høvdu gjørt *seg* lidnar.

11 Nú, tað bar á, at á hvørji tíð *ið* kistan varð førd at embæti kongs viðˆ hond Levitanna, og tá ið teir sóu, at *har var* nógvur peningur, komu skrivari kongs og yvirmaður høvuðsprestsins og tømdu kistuna, og tóku hana, og bóru hana til hennara plass aftur. Svá gjørdu teir dag um dag, og savnaðu pening í ríkiligleika.

12 Og kongur og Jə-hōĭ´-ă-dă góvu hann til slíkar sum gjørdu arbeiðið av tænastuni av HARRANS húsi, og leigaðu múrarar og træsmiðir at umvæla hús HARRANS, og eisini slíkar sum virkaðu jarn og messing til at gera í stand hús HARRANS.

13 So arbeiðsmenninir arbeiddu, og arbeiðið varð fullkomnað av teimum, og teir settu hús Guðs í stand sín, og styrktu tað.

14 Og tá ið teir høvdu fullført *tað,* førdu teir restina av peninginum framfyri kong og Jə-hōĭ´-ă-dă, hvarúr vórðu gjørd reiðir til hús HARRANS, *enntá* reiðir til at tæna, og til at ofra *við,* og sleivir, og reiðir av gulli og silvuri. Og teir ofraðu brennioffurˇ í húsi HARRANS áframhaldandi allar dagarnar hjá Jə-hōĭ´-ă-dă.

15 ¶ Men Jə-hōĭ´-ă-dă vaks gamalur, og var fullur av døgum tá ið hann doyði; eitt hundrað og tríati ára gamalur *var hann* tá ið hann doyði.

16 Og teir jarðaðu hann í staði Dávids millum konganna, av tí at hann hevði gjørt gott í Ísrael, bæði mótvegis Guði, og mótvegis húsi hansara.

17 Nú, eftir deyða Jə-hōĭ´-ă-dă komu prinsarnir av Judah, og intu heiðurslútan fyri kongi. Tá lýddi kongur á teir.

18 Og teir yvirgóvu hús HARRANS Guðs fedra sína, og tæntu lundum og skurðgudum: og vreiði kom uppá Judah og Jerusalem fyri hetta misbrot teirra.

19 Tó sendi hann prophetar til teirra, at føra teir aftur at HARRANUM; og teir vitnaðu ímóti teimum: men teir vildu ikki læna oyra.

20 Og Andi Guðs kom uppá Zĕch-ăr´-jăh Jə-hōĭ´-ă-dă son prest, sum stóð uppiyvir fólkinum, og segði við teir, Svá sigur Guð, Hví misbróta tit boðini hjá HARRANUM, at tit ei kunnu framganga? av tí at tit hava yvirgivið HARRAN, hevur hann eisini yvirgivið tykkum.

21 Og teir svóru *seg* saman ímóti honum, og steinaðu hann við steinum við boð kongs í forgarðinum av HARRANS húsi.

22 Soleiðis mintist Jó´-ăsj kongur ikki til blídnina sum Jə-hōĭ´-ă-dă faðir hansara hevði gjørt mót honum, men vó son hansara. Og tá ið hann doyði, segði hann, HARRIN hyggi uppá *tað,* og krevji *tað.*

23 ¶ Og tað bar á við endan av árinum, *at* herliðið hjá Sýriu kom upp ímóti honum: og teir komu til Judah og Jerusalem, og oyddu allar prinsarnar hjá fólkinum burturúr fólkinum, og sendu allan herfongin av teimum at kongi Damascusar.

24 Tí at herurin hjá Sýriulendingunum kom við einum lítlum flokki av monnum, og HARRIN flýggjaði eitt sera mikið herlið inn í hond teirra, av tí at teir høvdu yvirgivið HARRAN Guð fedra sína. So teir útintu dóm ímóti Jó´-ăsj.

25 Og tá ið teir vóru farnir avstað frá honum, (tí at teir eftirlótu hann í miklum sjúkdómum,) samansvóru hansara egnu tænarar *seg* ímóti honum fyri blóðið av sonum Jə-hōĭ´-ă-dă prests, og vógu hann á song hansara, og hann doyði: og teir jarðaðu hann í staði Dávids, men teir jarðaðu hann ikki í gravhýsum konganna.

26 Og hesir eru teir sum svóru *seg* saman ímóti honum; Zā′-băd, sonurin hjá Sjīm′-ĕ-ăth, eini Ammonitinnu; og Jĕ-hō′-zā-băd, sonurin hjá Sjīm′-rīth, eini Móabitinnu.

27 ¶ Nú, *viðvíkjandi* sonum hansara, og mikilleikanum av byrðunum *lagdar* uppá hann, og umvælingini av húsi Guðs, sí, teir *eru* skrivaðir í frásøgn kongabókarinnar. Og Ă-mă-zī′-ăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 25

Ă-MĂ-ZĪ′-ĂH *var* tjúgu og fimm ára gamalur *tá ið* hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti tjúgu og níggju ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Jĕ-hó′-ăd-dăn úr Jerusalem.

2 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, men ikki við einum fullkomnum hjarta.

3 ¶ Nú, tað bar á, tá ið kongadømið var grundfest til hansara, at hann vá tænarar sínar, sum høvdu vigið kong, faðir hansara.

4 Men hann vá ikki børn teirra, men *gjørdi* eins og skrivað *stendur* í lógini í bók Mósesar, har HARRIN ábeyð, sigandi, Fedrarnir skulu ikki doyggja fyri børnini, eiheldur skulu børnini doyggja fyri fedrarnar, men hvør maður skal doyggja fyri sína egnu synd.

5 ¶ Harafturat savnaði Ă-mă-zī′-ăh Judah saman, og gjørdi teir *til* høvuðsmenn yvir túsundum, og høvuðsmenn yvir hundraðum, samsvarandi við húsini hjá fedrum *teirra,* út gjøgnum alt Judah og Benjamin: og hann upptaldi teir frá tjúgu ára gomlum og omanfyri, og fann teir trý hundrað túsund úrvals *menn, førir fyri* at fara fram til kríggj, sum kundu handfara spjót og skjøld.

6 Hann leigaði eisini hundrað túsund mektigar reystsemis menn út úr Ísrael fyri hundrað talentir av silvuri.

7 Men tað kom ein Guðs maður til hansara, sigandi, O kongur, lat ikki Ísraels her fara við tær; tí at HARRIN *er* ikki við Ísrael, *tað vil siga, við* øllum børnum Ē′-phră-īm-s.

8 Men um tú vilt fara, ger *tað,* ver sterkur til bardagan: Guð skal fáa teg *at* falla frammi fyri fíggindanum: tí at Guð hevur mátt til at hjálpa, og til at kasta niður.

9 Og Ă-mă-zī′-ăh segði til Guðs mansins, Men hvat skulu vit gera fyri tær hundrað talentirnar sum eg havi givið til Ísraels hers? Og Guðs maður svaraði, HARRIN er førur fyri at geva tær mikið meiri enn hetta.

10 Tá atskildi Ă-mă-zī′-ăh teir, *tað vil siga,* herin sum var komin til hansara út úr Ē′-phră-īm, til at fara heim aftur: hvørsvegna teirra firtni varð stórliga kynd ímóti Judah, og teir vendu heim aftur í miklari firtni.

11 ¶ Og Ă-mă-zī′-ăh styrkti seg, og leiddi fram fólk sítt, og fór til salts-dalin, og sló av Sē′-īr-s børnum tíggju túsund.

12 Og *aðrar* tíggju túsund *eftir* á lívi bóru børnini av Judah burtur *til* fanga, og førdu teir at toppinum á klettinum, og kastaðu teir niður frá toppinum á klettinum, at teir allir vórðu brotnir í stykkir.

13 ¶ Men hermenninir av herinum sum Ă-mă-zī′-ăh sendi aftur, at teir skuldu ikki fara við honum til orrustuna, fullu uppá staðirnar av Judah, frá Să-mâr′-ī-ŭ enntá at Bĕth-hór′-ŏn, og slógu trý túsund av teimum, og tóku nógvan herfong.

14 ¶ Nú, tað bar á, eftir at Ă-mă-zī′-ăh var komin frá slátringini av Ē-dóm-īt′-unum, at hann førdi gudarnar hjá børnum Sē′-īr-s, og setti teir upp *til tess at vera* gudar sínar, og boygdi niður seg sjálvan frammi fyri teimum, og brendi roykilsi at teimum.

15 Hvørsvegna HARRANS firtni
varð kynd ímóti Ă-mă-zī′-ăh, og
hann sendi at honum ein prophet,
sum segði við hann, Hví hevurt
tú søkt eftir gudum fólksins, sum
kundu ikki útfría síni egnu fólk
út úr hond tíni?

16 Og tað bar á, sum hann
talaði við hann, at *kongur* segði
við hann, Ert tú gjørdur av ráði
kongsins? lat vera; hví skuldirt
tú verðið sligin? Tá læt pro-
pheturin vera, og segði, Eg veit,
at Guð hevur avrátt at oyða teg,
av tí at tú hevurt gjørt hetta, og
hevurt ikki lýtt á mítt ráð.

17 ¶ Tá tók Ă-mă-zī′-ăh kong-
ur av Judah tilráðing, og sendi til
Jó′-ăsj Jĕ-hó′-ă-hăz-ar sonar, Jehu-s
sonar, kongs av Ísrael, sigandi,
Kom, latum okkum síggja hvønn
annan í andlitið.

18 Og Jó′-ăsj kongur av Ísrael
sendi til Ă-mă-zī′-ăh kongs av
Judah, sigandi, Tistilin, sum *var* í
Lī′-bă-nŏn, sendi til sedris*træ-
ið,* sum *var* í Lī′-bă-nŏn, sigandi,
Gev dóttur tína til sonar míns til
konu: og tað fór framvið eitt
villini djór, sum *var* í Lī′-bă-nŏn,
og tróð niður tistilin.

19 Tú sigurt, Sí, tú hevurt slig-
ið Ê-dóm-ĭt′-arnar; og títt hjarta
lyftir teg upp til at rósa *tær:* verð
nú við hús; hví skuldirt tú blandað
teg uppí til skaða *tín,* at tú skuld-
irt fallið, *enntá* tú, og Judah við
tær?

20 Men Ă-mă-zī′-ăh vildi ikki
hoyra; tí at tað *kom* av Guði, at
hann mátti flýggja teir inn í hond-
ina *á teirra fíggindum,* av tí at teir
søktu eftir gudum Ē′-dóm-s.

21 So Jó′-ăsj, kongur Ísraels,
fór upp; og teir sóu hvør annan í
andlitið, *bæði* hann og Ă-mă-zī′-ăh
kongur av Judah, í Bĕth′-sjê-mĕsj,
sum *hoyrir* til Judah.

22 Og Judah varð sett til hins
verra frammi fyri Ísrael, og teir
flýddu hvør maður til tjalds síns.

23 Og Jó′-ăsj, kongur Ísraels,
tók Ă-mă-zī′-ăh kong av Judah,
son Jó′-ăsj, sonar Jĕ-hó′-ă-hăz-ar,
í Bĕth′-sjê-mĕsj, og førdi hann
til Jerusalem, og breyt niður
Jerusalems múr frá Ē′-phră-ĭm-s-
portrinum til hjørna-portrið, fýra
hundrað alnir.

24 Og *hann tók* alt gullið og
silvurið, og øll reiðini sum funn-
ust í húsi Guðs hjá Ō′-bĕd-ē′-
dóm-s, og dýrgripirnar av húsi
kongsins, gíslarnar eisini, og fór
aftur til Să-mâr′-ĭ-ŭ.

25 ¶ Og Ă-mă-zī′-ăh Jó′-ăsj son-
ur, kongur av Judah, livdi eftir
deyða Jŏ′-ăsj-ar Jĕ-hó′-ă-hăz sonar,
kongs av Ísrael, fimtan ár.

26 Nú, restin av gerningum
Ă-mă-zī′-ăh, fyrstir og síðstir, sí,
eru teir ikki skrivaðir í bók konga
Judah og Ísraels?

27 ¶ Nú, aftaná tíðina sum
Ă-mă-zī′-ăh vendi burtur frá at
fylgja HARRANUM, gjørdu teir eina
samansvørjing ímóti honum í
Jerusalem; og hann flýddi til Lá′-
chīsj: men teir sendu til Lá′-chīsj
eftir honum, og vógu hann har.

28 Og teir førdu hann uppiá
hestum, og jarðaðu hann hjá
fedrum hansara í staði Judah.

KAPITUL 26

TÁ tók alt fólkið av Judah
Ŭz′-zī-ăh, sum *var* sekstan
ára gamalur, og gjørdu hann *til*
kong í rúm faðirs hansara, Ă-mă-
zī′-ăh.

2 Hann bygdi Ē′-lōth, og endur-
veitti tað til Judah, eftir at kong-
ur svav hjá fedrum sínum.

3 Sekstan ára gamalur *var* Ŭz′-
zī-ăh, tá ið hann byrjaði at ríkja,
og hann ríkti fimti og tvey ár í
Jerusalem. Navn móður hansara
eisini *var* Jĕc-ô-lī′-ăh úr Jerusalem.

4 Og hann gjørdi *tað sum* rætt
var í eygsjón HARRANS, samsvar-
andi við alt sum faðir hansara,
Ă-mă-zī′-ăh, gjørdi.

5 Og hann søkti Guð í døgum Zĕch-ăr´-jăh, sum hevði skil í sjónum Guðs: og so leingi sum hann søkti HARRAN, fekk Guð hann at framganga.

6 Og hann fór fram og kríggjaði ímóti Philistunum, og breyt niður múr Gáths, og múr Jăb´-nēh, og múr Ăsj´-dŏd-s, og bygdi staðir kring Ăsj´-dŏd, og millum Philistanna.

7 Og Guð hjálpti honum ímóti Philistunum, og ímóti Arabarunum sum dvaldust í Gûr-bā´-ăl, og Mê-hŭ-nĭm´-unum.

8 Og Ammonitarnir góvu gávur til Ŭz´-zī-ăh: og hansara navn spreiddi *seg* útumkring *enntá* til inngongd Egyptalands; tí at hann styrkti *seg sjálvan* ovurhondsliga.

9 Harafturat bygdi Ŭz´-zī-ăh torn˘ í Jerusalem við hjørna-portrið, og við dal-portrið, og við snaringina *av múrinum,* og víggirdi tey.

10 Hann eisini bygdi torn˘ í oyðimørkini, og gróv mangar brunnar: tí hann hevði nógvan fenað, bæði í láglendinum, og í slættunum: jarðyrkismenn *eisini,* og víngarðsmenn í fjøllunum, og í Carmel: tí hann elskaði jarðyrki.

11 Harafturat hevði Ŭz´-zī-ăh eitt herlið av stríðandi monnum, sum fóru út til kríggj í liðum, samsvarandi við talið á teirra uppgerð við^ hendi Jē´-î-ĕl-s skrivara og Mă-ă-sēj´-ăh stjórnara, undir hond Hă-năn´-jăh, *ēin* av høvuðsmonnum kongs.

12 Heila talið á teimum fremstu av fedrunum hjá teimum mektigu reystsemis monnunum *vóru* tvey túsund og seks hundrað.

13 Og undir teirra hond *var* ein herur, trý hundrað túsund og sjey túsund og fimm hundrað, sum førdu kríggj við mektigari kraft, at hjálpa kongi ímóti fíggindanum.

14 Og Ŭz´-zī-ăh fyribúði til teirra út gjøgnum alt herliðið skjøldrar, og spjót˘, og hjálmar, og bróstbrynjur, og bogar, og sleingjur *til at kasta* steinar.

15 Og hann gjørdi í Jerusalem maskinur, uppfunnar av hegnigum monnum, at vera á tornunum og uppiá hervirkjunum, til at skjóta ørvar og stórar steinar við. Og hansara navn breiddist langt útumkring; tí at hann varð undranarsamliga hjálptur, til hann varð sterkur.

16 ¶ Men tá ið hann var sterkur, varð hansara hjarta lyft upp til *hansara* oyðing: tí hann misbreyt ímóti HARRANUM Guði sínum, og fór inn í tempul HARRANS at brenna roykilsi uppiá roykilsis-altarinum.

17 Og Â-zăr´-jăh prestur fór inn eftir honum, og við honum fýrsinstjúgu prestar HARRANS, *sum vóru* reystir menn:

18 Og teir stóðu ímóti Ŭz´-zī-ăh kongi, og søgdu við hann, *Tað tilhoyrir* ikki tær, Ŭz´-zī-ăh, at brenna roykilsi at HARRANUM, men til prestanna, sona Aarons, sum eru innvígaðir til at brenna roykilsi: far út úr halgidóminum; tí at tú hevurt misbrotist; eiheldur *skal tað vera* til tín heiður frá HARRANUM Guði.

19 Tá varð Ŭz´-zī-ăh vreiður, og *hevði* eina roykilsis-pannu í síni hond til at brenna roykilsi: og meðan hann var vreiður við prestarnar, reis enntá spitalsknin upp í enni hansara frammi fyri prestunum í húsi HARRANS, frá við síðuna av roykilsis-altarinum.

20 Og Â-zăr´-jăh, tann fremsti presturin, og allir prestarnir, hugdu uppá hann, og sí, hann *var* spitalskur í enni sínum, og teir stoyttu hann út haðani frá; ja, sjálvur hann skundaði *sær* eisini at fara út, av tí at HARRIN hevði sligið hann.

21 Og Ŭz´-zī-ăh kongur var ein spitalskur at degi deyða síns, og dvaldist í einum atskildum húsi, *verandi* ein spitalskur; tí at hann var skorin av frá húsi HARRANS: og Jó´-thăm, sonur hansara, *var* yvir kongshúsinum, dømandi fólk landsins.

22 ¶ Nú, restina av gerningum Ŭz´-zī-ăh, fyrstir og síðstir, skrivaði Esaiah prophetur, Amoz sonur.

23 So Ŭz´-zī-ăh svav hjá fedrum sínum, og teir jarðaðu hann hjá hansara fedrum í akrinum av jarðingini sum *hoyrdi* til konganna; tí at teir søgdu, Hann *er* ein spitalskur: og Jó´-thăm, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 27

JÓ´-THĂM *var* tjúgu og fimm ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti sekstan ár í Jerusalem. Navn móður hansara eisini *var* Jĕ-rū´-sjăh Zā´-dŏk-s dóttir.

2 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, samsvarandi við alt sum faðir hansara, Ŭz´-zī-ăh, gjørdi: hvussu enn er, hann innfór ikki inn í tempul HARRANS. Og fólkið gjørdi enn spilluliga.

3 Hann bygdi tað høga portrið av húsi HARRANS, og á múri Ō´-phĕl-s bygdi hann mikið.

4 Harafturat bygdi hann staðir í fjøllum Judah, og í skógunum bygdi hann slottˇ og tornˇ.

5 ¶ Hann bardist eisini við kong Ammonitanna, og hevði yvirluta ímóti teimum. Og Ammons børn góvu honum tað sama árið eitt hundrað talentir av silvuri, og tíggju túsund mál av hveiti, og tíggju túsund av byggi. So mikið rindaðu børn Ammons honum, bæði tað annað árið, og tað triðja.

6 So Jó´-thăm gjørdist mektigur, av tí at hann fyrireikaði vegir sínar frammi fyri HARRANUM Guði sínum.

7 ¶ Nú, restin av gerningum Jó´-thăm-s, og øll hansara kríggj, og hansara vegir, sí, teir *eru* skrivaðir í bók konganna av Ísrael og Judah.

8 Hann var fimm og tjúgu ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og ríkti sekstan ár í Jerusalem.

9 ¶ Og Jó´-thăm svav hjá fedrum sínum, og teir jarðaðu hann í staði Dávids: og Áhaz, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 28

ÁHAZ *var* tjúgu ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti sekstan ár í Jerusalem: men hann gjørdi ikki *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, líka *sum* Dávid, faðir hansara:

2 Tí at hann gekk í vegunum hjá kongum Ísraels, og gjørdi eisini bræddar myndir til Bā´-ă-lĭm.

3 Harafturat brendi hann roykilsi í dali Hĭn´-nōm-s sonar, og brendi børn síni í eldinum, eftir andstygdum teirra heidnu, hvørjar HARRIN hevði kastað út undan børnum Ísraels.

4 Hann sláturofraði eisini og brendi roykilsi í teimum høgu plássunum, og á heyggjunum, og undir hvørjum grønum træi.

5 Hvørsvegna HARRIN Guð hansara flýggjaði hann inn í hondina á konginum av Sýriu; og teir slógu hann, og bóru burtur eina stóra fjøld av teimum *til* fangar, og førdu *tey* til Damascus. Og hann varð eisini flýggjaður inn í hondina á konginum av Ísrael, sum sló hann við eini miklari slátran.

6 ¶ Tí at Pē´-kăh Rĕ-măl´-jăh sonur vó í Judah eitt hundrað og tjúgu túsund í ēinum degi, *sum*

vóru allir reystir menn; av tí at teir høvdu yvirgivið HARRAN Guð fedra sína.

7 Og Zĭch´-rī, ein mektigur maður úr Ē´-phră-ĭm, vó Mā-ă-sēj´-ăh, son kongsins; og Ăz´-rī-kăm, stjórnara hússins; og Ĕl´-kă-năh, *sum var* næstur mót kongi.

8 Og børn Ísraels bóru burtur *til* fanga av brøðrum sínum tvey hundrað túsund, kvinnur, synir, og døtur, og tóku eisini burtur nógvan herfong frá teimum, og førdu herfongin til Să-mâr´-ī-ŭ.

9 Men ein prophetur HARRANS var har, hvørs navn *var* Ō´-dĕd: og hann fór út framfyri herliðið sum kom til Să-mâr´-ī-ŭ, og segði við teir, Sí, av tí at HARRIN Guð fedra tykkara var vreiður við Judah, hevur hann flýggjað teir inn í hond tykkara, og tit hava vigið teir í eini øði *sum* røkkur upp at himni.

10 Og nú ætla tit at halda niðri børnini av Judah og Jerusalem til trælsveinar og trælkvinnur hjá tykkum: *men eru* ikki hjá tykkum, enntá hjá tykkum, syndir ímóti HARRANUM Guði tykkara?

11 Nú, hoyrið meg tessvegna, og flýggið fangarnar aftur, sum tit hava tikið *til* fanga av brøðrum tykkara: tí hin grimma vreiði HARRANS *er* uppiá tykkum.

12 Ávísir tá av høvdum Ē´-phră-ĭm-s barna, Â-zăr´-jăh Jó´-hă-năn-s sonur, Bĕr-ĕ-chī´-ăh Mĕ-sjīl´-lĕ-mōth-s sonur, og Jĕ-hĭz´-kī-ăh Sjăl´-lŭm-s sonur, og Á´-mâ-să Hăd´-lâ-ī-s sonur, stóðu upp ímóti teimum sum komu frá krígnum,

13 Og søgdu við teir, Tit skulu ikki føra inn fangarnar higar: tí at hvar ið vit hava brotist ímóti HARRANUM *allareiða,* ætla tit at leggja afturat *meira* til syndir okkara og til misbrot okkara: tí at okkara misbrot er mikið, og *tað finst* grimm vreiði ímóti Ísrael.

14 So teir vápnaðu menninir eftirlótu fangarnar og herfongin frammi fyri prinsunum og allari samkomuni.

15 Og menninir, sum vóru úttryktir við navni, risu upp, og tóku fangarnar, og við herfonginum klæddu øll sum vóru nakin teirra millum, og skrýddu tey, og skógvaðu tey, og góvu teimum at eta og at drekka, og salvaðu tey, og bóru øll tey ússaligu av teimum uppiá asnum, og førdu tey til Jericho, pálmatræa-staðin, til brøður teirra: so vendu teir aftur til Să-mâr´-ī-ŭ.

16 ¶ Á teirri tíð sendi Áhaz kongur at kongunum av Assýriu at hjálpa sær.

17 Tí at aftur vóru Ê-dóm-ĭt´-arnir komnir og *høvdu* sligið Judah, og borið burtur fangar.

18 Philistarnir eisini høvdu lopið á staðirnar av láglendinum, og av suður*part*inum av Judah, og høvdu tikið Bĕth´-sjê-mĕsj, og Ăj´-ă-lŏn, og Gĕ-dē´-rōth, og Sjō´-chō við bygdum hans, og Tĭm´-năh við bygdum hans, Gĭm´-zō eisini og hansara bygdir: og teir dvaldust har.

19 Tí at HARRIN førdi Judah lágt uppá grund av Áhaz kongi av Ísrael; tí at hann gjørdi Judah nakið, og misbreyt sáran ímóti HARRANUM.

20 Og Tĭl´-găth-pĭl-nē´-sĕr kongur av Assýriu kom at honum, og voldi honum neyð, men styrkti hann ikki.

21 Tí at Áhaz tók burtur ein skamt *út* úr húsi HARRANS, og *út* úr húsi kongsins, og prinsanna, og gav konginum av Assýriu *hann:* men hann hjálpti honum ikki.

22 ¶ Og í tíðini av síni neyð misbreyt hann enn meira ímóti HARRANUM: hetta *er hasin* Áhaz kongur.

23 Tí hann sláturofraði gudunum av Damascus, sum slógu hann: og hann segði, Av tí at gudarnir hjá kongunum av Sýriu hjálptu teimum, *tí* vil eg sláturofra til teirra, at teir mega hjálpa mær. Men teir vórðu oyðileggingin av honum, og av øllum Israel.

24 Og Áhaz savnaði saman reiðir húsar Guðs, og skar í stykkir reiðir húsar Guðs, og lokaði fyri hurðarnar av húsi HARRANS, og hann gjørdi sær altør í hvørjum hjørni Jerusalems.

25 Og í hvørjum einstøkum staði av Judah gjørdi hann høg pláss til at brenna roykilsi at øðrum gudum, og tirraði til firtnis HARRAN Guð fedra sína.

26 ¶ Nú, restin av gerningum hansara og av øllum hansara vegum, fyrstir og síðstir, sí, teir *eru* skrivaðir í bók konganna av Judah og Ísrael.

27 Og Áhaz svav hjá fedrum sínum, og teir jarðaðu hann í staðinum, *enntá* í Jerusalem: men teir førdu hann ikki inn í gravhýsini hjá kongunum av Ísrael: og Hëz-ë-kĭ´-ăh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 29

HËZ-Ë-KĬ´-ĂH byrjaði at ríkja *tá ið hann var* fimm og tjúgu ára gamalur, og hann ríkti níggju og tjúgu ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Á-bĭ-jăh Zĕch-ăr´-jăh dóttir.

2 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, samsvarandi við alt sum Dávid, faðir hansara, hevði gjørt.

3 ¶ Hann, í tí fyrsta árinum av ríkjan síni, í tí fyrsta mánaðinum, opnaði hurðarnar av húsi HARRANS, og umvældi tær.

4 Og hann førdi inn prestarnar og Levitarnar, og savnaði teir saman í eysturstrætið,

5 Og segði við teir, Hoyrið meg, tit Levitar, halgið nú tykkum sjálvar, og halgið hús HARRANS Guðs fedra tykkara, og berið út gravskitnina út úr hinum heilaga *plássinum*.

6 Tí at okkara fedrar hava misbrotist, og gjørt *tað sum* ilt *var* í eygum HARRANS Guðs várs, og hava yvirgivið hann, og hava vent burt andlitum sínum frá bústaði HARRANS, og vent *sínar* ryggir.

7 Eisini hava teir lokað aftur hurðarnar av forhøllini, og sløkt út lampurnar, og hava ikki brent roykilsi ella ofrað brennioffur˘ í hinum heilaga *plássinum* at Guði Ísraels.

8 Hvørsvegna vreiði HARRANS var uppiá Judah og Jerusalem, og hann hevur flýggjað teir til trongdar, til ótanar, og til fisingar, eins og tit síggja við eygum tykkara.

9 Tí at sí, okkara fedrar eru falnir við^ svørðinum, og okkara synir og okkara døtur og okkara konur *eru* í fangaskapi fyri hetta.

10 Nú *er tað* í mínum hjarta at gera ein sáttmála við HARRAN Guð Ísraels, at hansara grimma vreiði má venda burtur frá okkum.

11 Synir mínir, verið ikki nú vanrøknir: tí at HARRIN hevur valt tykkum at standa frammi fyri sær, at tæna honum, og at tit skuldu tæna at honum, og brenna roykilsi.

12 ¶ Tá reistust Levitarnir, Má´-hăth Á´-mă-saî-s sonur, og Jó´-ël Â-zăr´-jăh sonur, av sonum Kō-hăth-ĭt´-anna: og av Më-râr´-ĭ-s sonum, Kisj Abdĭ-s sonur, og Â-zăr´-jăh Jë-hăl´-ë-lël-s sonur: og av Gër-sjön-ĭt´-unum; Jó´-âh Zimmah sonur, og Eden Jó´-âh sonur:

13 Og av sonum Ë-lĭ´-zā-phăn-s; Sjĭm´-rĭ, og Jë´-î-ël: og av sonum Á´-săph-s; Zĕch-ăr´-jăh, og Măt-tă-nĭ´-ăh:

14 Og av sonum Hë´-măn-s; Jë-hĭ-ël, og Sjĭm´-ë-ĭ: og av sonum

Jĕ́-dŭ-thûn-s; Sjĕm-aĭ́-ăh, og Ŭz-zĭ-ĕl.

15 Og teir savnaðu brøður sínar, og halgaðu seg, og komu, samsvarandi við ábjóðan kongs, eftir orðum HARRANS, at reinsa hús HARRANS.

16 Og prestarnir fóru inn í hin innara part av húsi HARRANS, at reinsa *tað,* og fordu út alla óreinskuna sum teir funnu í templi HARRANS, inn í forgarðin av húsi HARRANS. Og Levitarnir tóku *tað,* at bera *tað* útum í áarløkin Kĭ́-drŏn.

17 Nú, teir byrjaðu á hinum fyrsta *degi* hins fyrsta mánaðar at halga, og á hinum áttanda degi mánaðarins komu teir til forgarð HARRANS: so teir halgaðu hús HARRANS í átta dagar; og í hinum sekstanda degi hins fyrsta mánaðar gjørdu teir enda *á*.

18 Tá fóru teir inn til Hĕz-ĕ-kĭ́-ăh kongs, og søgdu, Vit hava reinsað alt hús HARRANS, og brennioffurs-altarið, við øllum reiðum tess, og sýnisbreyðs-borðið, við øllum reiðum tess.

19 Harafturat øll reiðini, sum Áhaz kongur í síni ríkjan kastaði burtur í síni misbróting, hava vit fyrireikað og halgað, og sí, tey *eru* frammanfyri altari HARRANS.

20 ¶ Tá reis snimma Hĕz-ĕ-kĭ́-ăh kongur, og savnaði stjórnarar staðarins, og fór niðan til húss HARRANS.

21 Og teir komu við sjey ungtarvum, og sjey veðrum, og sjey lombum, og sjey bukkum, til eitt syndoffur fyri kongadømið, og fyri halgidómin, og fyri Judah. Og hann ábjóðaði prestunum, sonum Aarons, at ofra *tey* á altari HARRANS.

22 So teir drópu ungtarvarnar, og prestarnir móttóku blóðið, og slettu *tað* á altarið: somuleiðis, tá ið teir høvdu dripið veðrarnar, slettu teir blóðið uppá altarið: teir drópu eisini lombini, og teir slettu blóðið uppá altarið.

23 Og teir fordu fram bukkarnar *til* syndofrið framfyri kong og samkomuna; og teir løgdu hendur sínar uppá teir:

24 Og prestarnir drópu teir, og teir gjørdu endursóning við blóði teirra uppiá altarinum, til at gera eina sáttargerð fyri allan Ísrael: tí at kongur ábjóðaði, *at* brenniofrið og syndofrið *skuldu verða gjørt* fyri allan Ísrael.

25 Og hann setti Levitarnar í hús HARRANS við glymskálum, við psøltrum, og við hørpum, samsvarandi við áboðið hjá Dávidi, og hjá Gádi, síggjara kongs, og Náthan prophĕti: tí at *soleiðis var* áboðið hjá HARRANUM við prophĕtum sínum.

26 Og Levitarnir stóðu við ljóðførum Dávids, og prestarnir við lúðrunum.

27 Og Hĕz-ĕ-kĭ́-ăh ábjóðaði at ofra brenniofrið uppiá altarinum. Og tá ið brenniofrið byrjaði, byrjaði sangur HARRANS *eisini* við lúðrunum, og við ljóðførunum, *fyriskipað* av Dávid kongi av Ísrael.

28 Og øll samkoman tilbað, og sangararnir sungu, og lúðramenninir ljóðaðu: *og* alt *hetta helt áfram* inntil brenniofrið var fullgjørt.

29 Og tá ið teir høvdu lokið við at ofra, boygdu seg sjálvar kongur og allir sum vóru hjástaddir við honum, og tilbóðu.

30 Harafturat ábjóðaðu Hĕz-ĕ-kĭ́-ăh kongur og prinsarnir Levitunum at syngja prís at HARRANUM við orðunum hjá Dávidi, og hjá Á-săph síggjara. Og teir sungu prísingar við gleði, og teir boygdu síni høvur og tilbóðu.

31 Tá tók Hĕz-ĕ-kĭ́-ăh til máls og segði, Nú hava tit innvígað tykkum sjálvar at HARRANUM, komið nær og førið sláturoffur og tøkkoffur inn í hús HARRANS.

Og samkoman førdi inn sláturoffur˘ og tøkkoffur˘; og so mangir, sum vóru av einum fríum hjarta, brennioffur˘.

32 Og talið á brenniofrunum, sum samkoman kom við, var trísinstjúgu og tíggju ungtarvar, eitt hundrað veðrar, *og* tvey hundrað lomb: øll hesi *vóru* til eitt brennioffur til HARRANS.

33 Og tey innvígaðu tingini *vóru* seks hundrað oksar og trý túsund seyðir.

34 Men prestarnir vóru ov fáir, so at teir fingu ikki flett øll brenniofrini: hvørsvegna teirra bróður, Levitarnir, hjálptu teimum, til arbeiðið var endað, og inntil *hīnir* prestarnir høvdu halgað seg sjálvar: tí at Levitarnir *vóru* meiri reiðiligir í hjarta at halga seg sjálvar enn prestarnir.

35 Og eisini brenniofrini *vóru* í ríkiligleika, við feittinum av friðofrunum, og drykkofrunum til *hvørt* brenniofrið. So tænasta HARRANS húss varð sett í rættlag.

36 Og Hĕz-ĕ-kī´-ăh fegnaðist, og alt fólkið, at Guð hevði fyrireikað fólkið: tí at tingið varð *gjørt* brádliga.

KAPITUL 30

OG Hĕz-ĕ-kī´-ăh sendi til alt Ísrael og Judah, og skrivaði brøv eisini til Ē´-phră-ĭm-s og Mă-năs´-sēh, at teir skuldu koma til húss HARRANS í Jerusalem, at halda umleypið at HARRANUM Guði Ísraels.

2 Tí at kongur hevði hildið ráð, og hansara prinsar, og øll samkoman í Jerusalem, at halda umleypið í øðrum mánaðinum.

3 Tí at teir kundu ikki halda tað á teirri tíð, av tí at prestarnir høvdu ikki halgað seg sjálvar tilstrekkiliga, eiheldur hevði fólkið savnað seg saman til Jerusalem.

4 Og tað tingið toknaði kongi og allari samkomuni.

5 So teir grundløgdu eina løgskipan *um* at gera yvirlýsing út gjøgnum alt Ísrael, frá Bēēr´-sjĕbŭ enntá til Dán, at teir skuldu koma til *tess* at halda umleypið at HARRANUM Guði Ísraels í Jerusalem: tí at teir høvdu ikki gjørt *tað* í longri *tíð av slíkum slagi* sum skrivað stóð.

6 So post*boð*ini fóru við brøvunum frá kongi og hansara prinsum út gjøgnum alt Ísrael og Judah, og samsvarandi við ábjóðingina hjá kongi, sigandi, Tit Ísraels børn, vendið aftur at HARRANUM Guði Ábrahams, Ísaaks, og Ísraels, og hann vil koma aftur til leivdina av tykkum, sum hava komist undan út úr hondini á kongunum av Assýriu.

7 Og verið ikki tit líka *sum* fedrar tykkara, og líka *sum* bróður tykkara, sum misbrutust ímóti HARRANUM Guði fedra sína, *hvør* tessvegna gav teir upp til oyðingar, eins og tit síggja.

8 Nú, verið tit ikki harðsvíraðir, eins og fedrar tykkara *vóru, men* latið tykkum sjálvar at HARRANUM, og innfarið inn í halgidóm hans, sum hann hevur halgað um ævir: og tænið HARRANUM Guði tykkara, at grimdin av hansara vreiði má venda burtur frá tykkum.

9 Tí at um tit vendi aftur at HARRANUM, *skulu* bróður tykkara og børn tykkara *finna* miskunn frammi fyri teimum sum leiddu tey *til* fanga, so at tey skulu koma aftur inn í hetta land: tí at HARRIN Guð tykkara *er* náðisamur og miskunnarfullur, og vil ikki venda burt andliti *sínum* frá tykkum, um tit vendi aftur at honum.

10 So post*boð*ini fóru yvir frá staði til staðar ígjøgnum land Ē´-phră-ĭm-s og Mă-năs´-sēh enntá at Zē´-bŭ-lŏn: men teir læðu teir í háð, og spottaðu teir.

11 Hóast hetta, ymsir av Ásjer og Mă-năs´-sēh og av Zē´-bŭ-lŏn

eyðmýktu seg sjálvar, og komu til Jerusalem.

12 Eisini í Judah var hond Guðs til at geva teimum ēitt hjarta til at gera áboðið hjá kongi og hjá prinsunum, við orði HARRANS.

13 ¶ Og tað tyrptist í Jerusalem mikið fólk at halda hátíð ósúrgaðs breyðs í øðrum mánaðinum, ein sera mikil samkoma.

14 Og teir reistust og tóku burtur altarini sum *vóru* í Jerusalem, og øll altarini til roykilsi tóku teir burtur, og kastaðu *tey* inn í áarløkin Kī´-drǒn.

15 So drópu teir umleypið á tí fjúrtanda *deginum* av øðrum mánaðinum: og prestarnir og Levitarnir skammaðust, og halgaðu seg sjálvar, og førdu inn brenniofrini inn í hús HARRANS.

16 Og teir stóðu í sínum plássi eftir háttarlagi sínum, samsvarandi við lóg Móse, Guðs mansins: prestarnir slettu blóðið, *sum teir móttóku* av hendi Levitanna.

17 Tí at *tað vóru* mangir í samkomuni sum vóru ikki halgaðir: Levitarnir tessvegna høvdu áleggingina av drepingini av umleypunum fyri hvønn tann *sum var* ikki reinur, at halga *teir* at HARRANUM.

18 Tí at ein fjøld av fólkinum, *enntá* mangir av Ē´-phră-ĭm, og Mă-năs´-sēh, Ĭs´-să-chär, og Zē´-bŭlŏn, høvdu ikki reinsað seg sjálvar, tó ótu teir umleypið øðrvísi enn skrivað stóð. Men Hēz-ē-kī´-ăh bað fyri teimum, sigandi, Hin góði HARRI náði hvønn tann

19 *Sum* fyrireikar hjarta sítt at søkja Guð, HARRAN Guð fedra sína, tó *at hann veri* ikki *reinsaður* samsvarandi við skírgan halgidómsins.

20 Og HARRIN lurtaði eftir Hēz-ē-kī´-ăh, og grøddi fólkið.

21 Og børn Ísraels, sum vóru hjástaddir í Jerusalem, hildu hátíð ósúrgaðs breyðs *í* sjey dagar við miklari gleði: og Levitarnir og prestarnir prísaðu HARRANUM dag um dag, *syngjandi* við hørðum ljóðførum at HARRANUM.

22 Og Hēz-ē-kī´-ăh talaði uggandarsamligani við allar Levitarnar sum frálærdu hin góða kunnleika HARRANS: og teir ótu út gjøgnum hátíðina sjey dagar, ofrandi friðoffur, og gerandi játtan mót HARRANUM Guði fedra sína.

23 Og allur savnaðurin helt ráð *um* at halda aðrar sjey dagar: og teir hildu *aðrar* sjey dagar við gleði.

24 Tí at Hēz-ē-kī´-ăh kongur av Judah gav til samkomuna eitt túsund ungtarvar og sjey túsund seyðir; og prinsarnir góvu til samkomuna eitt túsund ungtarvar og tíggju túsund seyðir: og eitt stórt tal av prestum halgaðu seg sjálvar.

25 Og øll samkoman av Judah, við prestunum og Levitunum, og øll samkoman sum kom út úr Ísrael, og hinir fremmandu sum komu út úr landi Ísraels, og sum búðu í Judah, fegnaðust.

26 So har var stór frøi í Jerusalem: tí at síðan tíð Sálomons Dávids sonar, Ísraels kongs, *var* ikki tílíkt í Jerusalem.

27 ¶ Tá reistust prestarnir, Levitarnir, og vælsignaðu fólkið: og teirra rødd varð hoyrd, og teirra bøn kom *upp* til hans heilaga bústað, *enntá* at himni.

KAPITUL 31

NÚ, tá ið alt hetta var fullført, fóru allur Ísrael, sum vóru hjástaddir, út til staðirnar av Judah, og brutu myndirnar í stykkir, og skóru niður lundirnar, og blakaðu niður tey høgu plássini og altarini burtur úr øllum Judah og Benjamin, í Ē´-phră-ĭm eisini og Mă-năs´-sēh, inntil teir høvdu fullkomiliga oytt tey øll. Síðan vendu øll børn Ísraels aftur, hvør

maður til ognar sínar, inn í egnu staðir sínar.

2 ¶ Og Hëz-ë-kī´-ăh tilskilaði skiftini hjá prestunum og Levitunum eftir skiftum teirra, hvønn mann samsvarandi við hansara tænastu, prestarnar og Levitarnar til brennioffurˇ og til friðoffurˇ, til at tæna, og til at veita tøkkir, og til at prísa í portrunum av tjøldum HARRANS.

3 *Hann tilskilaði* eisini skamt kongsins av hansara *figgjar*evni til brenniofrini, *tað vil siga,* til morgun og kvøld brenniofrini, og brenniofrini til sabbatarnar, og til nýmánarnar, og til tær ásettu hátíðirnar, eins og skrivað *stendur* í lóg HARRANS.

4 Harafturat ábjóðaði hann fólkinum, sum búði í Jerusalem, at geva skamtin hjá prestunum og hjá Levitunum, at teir máttu verða tilstuðlaðir í lóg HARRANS.

5 ¶ Og so skjótt sum skipanin kom útumkring, førdu Ísraels børn í ríkiligleika frumávøkstirnar av korni, víni, og olju, og hunangi, og av allari grøði akursins; og tíggjundina av øllum *tingum* førdu teir inn ríkiligani.

6 Og *viðvíkjandi* børnum Ísraels og Judah, sum dvaldust í staðunum av Judah, teir eisini førdu inn tíggjundina av oksum og seyði, og tíggjundina av heilagum tingum, sum vóru innvígað at HARRANUM Guði teirra, og løgdu *tey* eftir rúgvum.

7 Í tí triðja mánaðinum byrjaðu teir at leggja grundarlagið av rúgvunum, og fullførdu *tær* í tí sjeynda mánaðinum.

8 Og tá ið Hëz-ë-kī´-ăh og prinsarnir komu og sóu rúgvurnar, vælsignaðu teir HARRAN, og hansara fólk Ísrael.

9 Tá spurdist Hëz-ë-kī´-ăh við prestarnar og Levitarnar viðvíkjandi rúgvunum.

10 Og Â-zăr´-jăh, tann fremsti presturin, av húsi Zā´-dŏk-s, svaraði honum, og segði, Síðan *fólkið* byrjaði at føra ofrini inn í hús HARRANS, hava vit havt nóg mikið at eta, og hava leivt ríkiligt: tí at HARRIN hevur vælsignað fólk sítt; og tað, sum er eftir, *er* henda mikla goymsla.

11 ¶ Tá beyð Hëz-ë-kī´-ăh at fyrireika kømur í húsi HARRANS; og teir fyrireikaðu *tey,*

12 Og førdu inn ofrini og tíggjundirnar og tey vígdu *tingini* trúfastligani: yvir hvørt Cô-nô-nī´-ăh Leviti *var* stjórnari, og Sjĭm´-ë-ī, bróðir hansara, *var* hin næsti.

13 Og Jë´-hĭ-ël, og Âz-ă-zī´-ăh, og Náhath, og Ás´-ă-hël, og Jër´-ĭ-mōth, og Jó´-zā-băd, og Ē´-lĭ-ël, og Is-mă-chĭ´-ăh, og Má´-hăth, og Bĕ-nā´-ăh, *vóru* umsjónarmenn undir hond Cô-nô-nī´-ăh og Sjĭm´-ë-ī-s, bróðurs hans, eftir ábjóðan Hëz-ë-kī´-ăh kongs, og Â-zăr´-jăh stjórnara húsar Guðs.

14 Og Kōr´-ê Ĭm´-năh sonur Leviti, duravørðurin ímóti eystri, *var* yvir fríviljaofrum Guðs, at útdeila tilbiðjanar-offurˇ HARRANS, og hini mest heilagu tingini.

15 Og næstir honum *vóru* Eden, og Mĭn´-ĭ-ă-mĭn, og Jē´-sjû-ă, og Sjĕm-ā´-ăh, Á-măr´-jăh, og Sjĕc-ăn´-jăh, í staðum prestanna, í *teirra* tilnevnda embæti, at geva til brøðra sína eftir skiftum, eins væl til hins mikla, sum til hins lítla:

16 Umframt teirra ættartal av hannum, frá trý ára gomlum og uppeftir, *enntá* hvørjum tí sum innfer inn í hús HARRANS, hansara dagliga skamt fyri teirra tænastu í teirra áleggingum samsvarandi við teirra skiftir;

17 Bæði til ættartals prestanna eftir húsi fedra teirra, og Levitanna frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, í teirra áleggingum eftir teirra skiftum;

18 Og til ættartals alra hinna smáu teirra, ektakona teirra, og sona teirra, og døtra teirra, gjøgnum alla samkomuna: tí í sínum tilnevnda embæti halgaðu teir seg sjálvar í heilagleika:

19 Eisini av sonum Aarons, prestunum, *sum vóru* í akrunum av forstaðunum av staðum sínum, í hvørjum ēinstøkum staði, menninir sum vórðu úttryktir við navni, at geva skamtir til alra hannanna prestanna millum, og til alra sum vórðu roknaðir eftir ættartølum Levitanna millum.

20 ¶ Og svá gjørdi Hēz-ē-kī´-āh út gjøgnum alt Judah, og virkaði *tað sum var* gott og rætt og sannleiki frammi fyri HARRANUM Guði sínum.

21 Og í hvørjum verki sum hann byrjaði í tænastuni av húsi Guðs, og í lógini, og í boðunum, at søkja Guð sín, hann gjørdi *tað* við øllum hjarta sínum, og framgekk.

KAPITUL 32

EFTIR hesar lutir, og grundleggingina harav, kom Sēn-năch´-ēr-īb kongur av Assýriu og innfór inn í Judah, og leiraðist ímóti teimum girdu staðunum, og hugsaði at vinna teir til sín sjálvs.

2 Og tá ið Hēz-ē-kī´-āh sá at Sēn-năch´-ēr-īb var komin, og at hann var avráddur *í* at berjast ímóti Jerusalem,

3 Helt hann ráð, við prinsum sínum og sínum mektigu monnum, *um* at tippa vøtnini av keldunum sum *vóru* uttanfyri staðin: og teir hjálptu honum.

4 So tað varð savnað mikið fólk saman, hvørjir tiptu allar keldurnar, og áarløkin sum rann ígjøgnum mittuna av landinum, sigandi, Hví skuldu kongarnir av Assýriu komið, og funnið mikið vatn?

5 Eisini styrkti hann seg sjálvan, og bygdi upp allan múrin sum var brotin, og reisti *hann* upp til tornini, og ein annan múr uttanfyri, og vældi um Mīl´-lō *í* staði Dávids, og gjørdi pílar og skildir í ríkiligleika.

6 Og hann setti krígshøvuðsmenn yvir fólkið, og savnaði teir saman til sín í gøtu staðarporturins, og talaði ugganarsamligani til teirra, sigandi,

7 Verið sterkir og mótigir, verið ikki ræddir ella mótfalnir yvir kongin av Assýriu, ella yvir alla fjøldina sum *er* við honum: tí at *tað veri seg* fleiri við okkum, enn við honum:

8 Við honum *er* ein armur av kjøti; men við okkum *er* HARRIN Guð okkara til at hjálpa okkum, og at berjast bardagar okkara. Og fólkið hallaði sær uppá orðini hjá Hēz-ē-kī´-āh kongi av Judah.

9 ¶ Eftir hetta sendi Sēn-năch´-ēr-īb kongur av Assýriu tænarar sínar til Jerusalem, (men *sjálvur* hann *legði kringseting* ímóti Lá´-chĭsj, og alt hansara vald við honum,) at Hēz-ē-kī´-āh kongi av Judah, og at øllum Judah sum *vóru* í Jerusalem, sigandi,

10 Svá sigur Sēn-năch´-ēr-īb kongur av Assýriu, Hvará troysta tit, at tit eru *verandi* í kringsetingini í Jerusalem?

11 Tilskundar ikki Hēz-ē-kī´-āh tykkum at yvirgeva tykkum til at doyggja við hungursneyð og við torsta, sigandi, HARRIN Guð okkara skal bjarga okkum út úr hondini á konginum av Assýriu?

12 Hevur ikki hin sami Hēz-ē-kī´-āh tikið burt síni høgu pláss og síni altar, og ábjóðað Judah og Jerusalem, sigandi, Tit skulu tilbiðja frammanfyri ēinum altari, og brenna roykilsi uppiá tí?

13 Vita tit ikki hvat eg og mínir fedrar hava gjørt innat øllum fólki *annara* landa? vóru gudarnir

hjá tjóðunum av teimum londunum nakrar vegir førir fyri at bjarga londum sínum út úr hond míni?

14 Hvør *var tað* millum alra guda teirra tjóða sum mínir fedrar aldeilis oyddu, sum kundi bjarga fólki sínum út úr hond míni, at Guð tykkara skuldi verið førur fyri at bjarga tykkum út úr hond míni?

15 Nú tessvegna, latið ikki Hëz-ë-kí´-ăh tøla tykkum, ella tilskunda tykkum á henda hátt, eiheldur tá trúgvið honum: tí at eingin gudur hjá nakrari tjóð, ella kongadømi, var førur fyri at bjarga fólki sínum út úr hond míni, og út úr hond fedra mína: hvør mikið minni skal Guð tykkara bjarga tykkum út úr hond míni?

16 Og hansara tænarar talaðu enn *meiri* ímóti HARRANUM Guði, og ímóti tænara hansara Hëz-ë-kí´-ăh.

17 Hann skrivaði eisini brøv til at skelda út inná HARRAN Guð Ísraels, og at tala ímóti honum, sigandi, Eins og gudarnir hjá tjóðunum av *øðrum* londum hava ikki bjargað fólki sínum út úr hond míni, so skal ikki Guð Hëz-ë-kí´-ăh bjarga fólki sínum út úr hond míni.

18 Tá róptu teir við eini harðari rødd í Jødanna talu innat fólkinum av Jerusalem sum *vóru* á múrinum, til at ræða teir, og at órógva teir; at teir máttu tikið staðin.

19 Og teir talaðu ímóti Guði Jerusalems, sum ímóti gudunum hjá fólkum jarðarinnar, *sum vóru* verkið av mannahondum.

20 Og fyri hesa *grund* bóðu Hëz-ë-kí´-ăh kongur, og prophetturin Esaiah Amoz sonur og rópaðu til himins.

21 ¶ Og HARRIN sendi ein eingil, sum skar av allar teir mektigu reystsemis menninar, og leiðararnar og høvuðsmenninar í leirinum hjá konginum av Assýriu. So hann vendi aftur við skomm av andliti til egna lands síns. Og tá ið hann var komin inn í hús guds síns, vógu teir, sum komu fram úr hansara egnu innangoymslum, hann har við svørðinum.

22 Svá bjargaði HARRIN Hëz-ë-kí´-ăh og íbúgvunum av Jerusalem frá hendi Sën-năch´-ër-ĭb-s, Assýriu kongs, og frá hondini á øllum *øðrum,* og leiddi teir á hvørjari síðu.

23 Og mangir førdu gávur at HARRANUM til Jerusalem, og gávur til Hëz-ë-kí´-ăh kongs av Judah: so at hann varð stórgjørdur í eygsjónini á øllum tjóðum haðanífrá.

24 ¶ Í teimum døgum varð Hëz-ë-kí´-ăh sjúkur til deyðan, og bað at HARRANUM: og hann talaði innat honum, og hann gav honum eitt tekin.

25 Men Hëz-ë-kí´-ăh rindaði ikki aftur samsvarandi við vælgerðina, *gjørd* innat honum; tí at hansara hjarta var lyft upp: tað var tessvegna vreiði uppiá honum, og uppiá Judah og Jerusalem.

26 Hóast hetta, Hëz-ë-kí´-ăh eyðmýkti seg sjálvan vegna hugmóð hjarta síns, *bæði* hann og íbúgvar Jerusalems, so at vreiði HARRANS kom ikki uppá teir á døgum Hëz-ë-kí´-ăh.

27 ¶ Og Hëz-ë-kí´-ăh hevði ovurhonds nógvar ríkdómar og heiður: og hann gjørdi sær dýrgripagoymslur til silvur, og til gull, og til dýrabærar steinar, og til kryddurtir, og til skildir, og til alt háttarlag av dámligum skartgripum;

28 Goymsluhúsˇ eisini til úrtøkuna av korni, og víni, og olju; og stallar til alt háttarlag av djórum, og byrgir til smáfæafylgir.

29 Harafturat skaffaði hann sær borgir, og ognir av smáfæafylgjum og stórfæafylgjum í ovurnøgd: tí at Guð hevði givið honum *figgjar*evni sera nógv.

30 Hesin sami Hĕz-ĕ-kī´-ăh eisini tipti hina ovaru vatnleiðing Gī´-hŏn-s, og førdi hana beint oman til vestur síðuna av staði Dávids. Og Hĕz-ĕ-kī´-ăh framgekk í øllum verkum sínum.

31 ¶ Hvussu enn er, í *málinum um* umboðsmenninar hjá prinsum Bábylons, sum sendu at honum at fregna um undrið sum var *gjørt* í landinum, yvirgav Guð hann, *fyri* at royna hann, at hann mátti vita alt *sum var* í hjarta hansara.

32 ¶ Nú, restin av gerningum Hĕz-ĕ-kī´-ăh, og hansara góðsemi, sí, teir *eru* skrivaðir í sjón Esaiah prophets Amoz sonar, *og* í bók konganna av Judah og Ísrael.

33 Og Hĕz-ĕ-kī´-ăh svav hjá fedrum sínum, og teir jarðaðu hann í hinum høvuðs av gravhýsum Dávids sona: og alt Judah og íbúgvarnir av Jerusalem intu honum heiður við deyða hansara. Og Mă-năs´-sēh, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 33

MĂ-NĂS´-SĒH *var* tólv ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti fimti og fimm ár í Jerusalem:

2 Men gjørdi *hatta sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, líkt andstygdunum hjá teimum heidnu, hvørjar HARRIN hevði kastað út undan børnum Ísraels.

3 ¶ Tí at hann bygdi aftur hini høgu pláss sum Hĕz-ĕ-kī´-ăh, faðir hansara, hevði brotið niður, og hann reisti upp altarˇ til Bā´-ălīm, og gjørdi lundir, og tilbað alt herlið himins, og tænti teimum.

4 Eisini bygdi hann altarˇ í húsi HARRANS, hvarum HARRIN hevði sagt, Í Jerusalem skal navn mítt vera um ævir.

5 Og hann bygdi altarˇ til alt herlið himins í teimum tveimum forgørðunum av húsi HARRANS.

6 Og hann voldi børnum sínum at fara ígjøgnum eldin í dali Hĭn´-nŏm-s sonar: hann eisini eygleiddi tíðir, og brúkti rúnagandanir, og brúkti heksakunst, og fekst við ein vælkunnugan anda, og við gandakallar: hann virkaði mikið ilt í eygsjón HARRANS, at tirra hann til firtnis.

7 Og hann setti eina *út*skorna mynd, skurðgudin — hvønn hann hevði gjørt, í hús Guðs, um hvørt Guð hevði sagt til Dávids og til Sálomons, sonar hansara, Í hetta hús, og í Jerusalem, sum eg havi valt framum allar ættargreinir Ísraels, vil eg seta navn mítt um ævir:

8 Eiheldur vil eg meira burtflyta fót Ísraels burturúr landinum sum eg havi útnevnt til fedra tykkara; so at teir vilja geva gætur eftir at gera alt sum eg havi áboðið teimum, samsvarandi við hina samfullu lóg og ásetingarnar og regluskipanirnar viðˆ hendi Móse.

9 So Mă-năs´-sēh fekk Judah og íbúgvarnar av Jerusalem at fara skeivar, *og* at gera verri enn teir heidnu, hvørjar HARRIN hevði oytt undan børnum Ísraels.

10 Og HARRIN talaði til Mănăs´-sēh, og til fólks síns: men teir vildu ikki geva gætur.

11 ¶ Hvørsvegna HARRIN førdi uppá teir høvuðsmenninar av herliði kongsins av Assýriu, sum tóku Mă-năs´-sēh millum torna*run*narnar, og bundu hann við fjøtrum, og bóru hann til Bábylon.

12 Og tá ið hann var í nívd, bønaði hann HARRAN Guð sín, og eyðmýkti seg sjálvan stórligani frammi fyri Guði fedra sína,

13 Og bað at honum: og hann varð bønaður av honum, og hoyrdi umbøning hans, og førdi hann aftur til Jerusalem inn í kongadømi sítt. Tá vitsti Mă-năs´-sēh, at HARRIN – hann *var* Guð.

14 Nú, eftir hetta bygdi hann ein múr uttanfyri stað Dávids, á vestur síðuni av Gĭ´-hŏn, í dalinum, enntá til innfaringina inn við fiska-portrið, og kringfór kring Ō´-phĕl, og reisti hann upp eina sera mikla hædd, og setti krígshøvuðsmenn í allar teir girdu staðirnar av Judah.

15 Og hann tók burt hinar fremmandu gudar, og skurðgudin út úr húsi HARRANS, og øll altarini sum hann hevði bygt á fjalli HARRANS húss, og í Jerusalem, og kastaði *tey* út úr staðinum.

16 Og hann gjørdi í stand altar HARRANS, og sláturofraði hará friðoffurˇ og takkoffurˇ, og beyð Judah at tæna HARRANUM Guði Ísraels.

17 Hóast hetta, fólkið sláturofraði enn í teimum høgu plássunum, *tó* HARRANUM Guði sínum einans.

18 ¶ Nú, restin av gerningum Mă-năs´-sēh, og hansara bøn at Guði sínum, og orðini hjá síggjarunum sum talaðu til hansara í navni HARRANS Guðs Ísraels, sí, teir *eru skrivaðir* í bók konga Ísraels.

19 Hansara bøn eisini, og *hvussu Guð* varð bønaður av honum, og allar hansara syndir, og hansara misbrot, og plássini – í hvørjum hann bygdi høg pláss, og setti upp lundir og ristar myndir, áðrenn hann varð eyðmýktur: sí, tey *eru* skrivað millum framsagnir síggjaranna.

20 ¶ So Mă-năs´-sēh svav hjá fedrum sínum, og teir jarðaðu hann í egna húsi hansara: og Ámon, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

21 ¶ Ámon *var* tvey og tjúgu ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og ríkti tvey ár í Jerusalem.

22 Men hann gjørdi *hatta sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS, eins og gjørdi Mă-năs´-sēh, faðir hansara: tí at Ámon sláturofraði øllum teimum *út*skornu myndunum sum Mă-năs´-sēh, faðir hansara, hevði gjørt, og tænti teimum;

23 Og eyðmýkti ikki seg sjálvan frammi fyri HARRANUM, eins og Mă-năs´-sēh, faðir hansara, hevði eyðmýkt seg sjálvan, men Ámon misbreyt meir og meir.

24 Og hansara tænarar svóru *seg* saman ímóti honum, og vógu hann í egna húsi hansara.

25 ¶ Men landsins fólk vó allar teir sum høvdu svorið *seg* saman ímóti Ámon kongi; og landsins fólk gjørdi Jó´-sĭ-ăh, son hansara, *til* kong í hansara stað.

KAPITUL 34

JÓ´-SĬ-ĂH *var* átta ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti í Jerusalem ēitt og tríati ár.

2 Og hann gjørdi *tað sum* rætt *var* í eygsjón HARRANS, og gekk í vegum Dávids, faðirs síns, og trekti *seg hvørki* til hinnar høgru handar, ella til hinnar vinstru.

3 ¶ Tí at í tí áttanda árinum av ríkjan síni, meðan hann var enn ungur, byrjaði hann at søkja eftir Guði Dávids, faðirs síns: og í tí tólvta árinum byrjaði hann at reinska Judah og Jerusalem frá teimum høgu plássunum, og lundunum, og teimum *út*skornu myndunum, og teimum bræddu myndunum.

4 Og teir brutu niður altarˇ Bā´-ă-lĭm-s í nærveru hansara; og myndirnar, sum *vóru* til hæddar uppiyvir teimum, skar hann niður; og lundirnar, og tær telgdu

myndirnar, og tær bræddu myndirnar, breyt hann í stykkir, og gjørdi støv *úr teimum,* og stroyddi *tað* uppá gravirnar hjá teimum sum høvdu sláturofrað at teimum.

5 Og hann brendi beinini hjá prestunum uppiá altarum teirra, og reinsaði Judah og Jerusalem.

6 Og *svá gjørdi hann* í staðum Mă-năs´-sēh, og Ē´-phră-ĭm-s, og Símeons, enntá at Năph´-tâ-lī, við teirra hakkarum runt umkring.

7 Og tá ið hann hevði brotið niður altarini og lundirnar, og hevði sligið tær *út*skornu myndirnar í pulvur, og skorið niður allar skurðgudarnar út gjøgnum alt land Ísraels, vendi hann aftur til Jerusalem.

8 ¶ Nú, í tí átjanda árinum av ríkjan síni, tá ið hann hevði reinskað landið, og húsið, sendi hann Sjá´-phăn Âz-ăl´-jăh son, og Mā-ă-sĕj´-ăh, stjórnara staðarins, og Jó´-âh Jó´-ă-hăz-ar son skrásetara, at umvæla hús HARRANS Guðs síns.

9 Og tá ið teir komu til Hĭl´-kī-ăh høvuðsprests, flýggjaðu teir peningin, sum var førdur, inn í hús Guðs, hvønn Levitarnir, sum varðaðu dyrnar, høvdu savnað av hendi Mă-năs´-sēh og Ē´-phră-ĭm-s, og av allari leivdini av Ísrael, og av øllum Judah og Benjamin; og teir vendu aftur til Jerusalem.

10 Og teir koyrdu *hann* í hondina á verkamonnunum sum høvdu umsjónina av húsi HARRANS, og teir góvu hann til verkamannanna sum arbeiddu í húsi HARRANS, at væla um og gera í stand húsið:

11 Enntá til listhandverkaranna og byggjaranna góvu teir *hann,* at keypa høgdan stein, og timbur til groypingar, og til at gólva húsini sum kongarnir av Judah høvdu oyðilagt.

12 Og menninir gjørdu arbeiðið trúfastligani: og teirra umsjónarmenn *vóru* Já´-hăth og Ó-bă-dī´-ăh, Levitarnir, av sonum Mĕ-râr´-ī-s; og Zĕch-ăr´-jăh og Mĕ-sjŭl´-lăm, av sonum Kō-hăth-ĭt´-anna, at dríva *tað* frameftir; og *aðrir av* Levitunum, allir sum dugdu tónleiks-ljóðføra hegni.

13 Eisini *vóru teir* yvir berarunum av byrðum, og *vóru* umsjónarmenn hjá øllum sum virkaðu verkið í nøkrum háttarlagi av tænastu: og av Levitunum *vóru* skrivarar, og yvirmenn, og duravørðir.

14 ¶ Og tá ið teir førdu út peningin sum varð førdur inn í hús HARRANS, fann Hĭl´-kī-ăh prestur eina bók lógar HARRANS, *givin* við Mósesi.

15 Og Hĭl´-kī-ăh tók til orða og segði við Sjá´-phăn skrivara, Eg havi funnið bók lógarinnar í húsi HARRANS. Og Hĭl´-kī-ăh flýggjaði bókina til Sjá´-phăn-s.

16 Og Sjá´-phăn bar bókina til kongs, og bar kongi orð tilbakar aftur, sigandi, Alt, sum varð litið upp til tænara tína, teir gera *tað*.

17 Og teir hava savnað saman peningin sum varð funnin í húsi HARRANS, og hava flýggað hann inn í hondina á umsjónarmonnunum, og til handar arbeiðsmannanna.

18 Tá segði Sjá´-phăn skrivari kongi frá, sigandi, Hĭl´-kī-ăh prestur hevur givið mær eina bók. Og Sjá´-phăn las hana frammi fyri kongi.

19 Og tað bar á, tá ið kongur hevði hoyrt orð lógarinnar, at hann skræddi klæðir síni.

20 Og kongur ábjóðaði Hĭl´-kī-ăh, og Á´-hī-kăm-i Sjá´-phăn-s syni, og Abdon-i Mī´-căh syni, og Sjá´-phăn skrivara, og A-sā´-ăh, einum tænara hjá kongi, sigandi,

21 Farið, fregnið av HARRANUM fyri meg, og fyri teir sum eru eftir í Ísrael og í Judah, viðvíkjandi orðum bókarinnar sum er funnin: tí at mikil *er* vreiði HARRANS sum er helt út omanyvir okkum, av tí at fedrar okkara hava ikki hildið orð HARRANS, at gera eftir øllum sum stendur skrivað í hesi bók.

22 Og Hil´-kī-ăh, og *teir* sum kongur *hevði útnevnt,* fóru til Hŭl´-dŭh prophetinnu, ektakonu Sjăl´-lŭm-s Tĭk´-văth-s sonar, Hăs´-răh sonar, passara klædnarúmsins; (nú, hon búði í Jerusalem, í studentagarðinum:) og teir talaðu til hennara í tann *rætning.*

23 ¶ Og hon svaraði teimum, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Sigið tit manninum sum sendi tykkum til mín,

24 Svá sigur HARRIN, Sí, eg vil føra ilt omanyvir hetta plass, og omanyvir íbúgvar tess, *enntá* allar banningarnar sum standa skrivaðar í bókini sum teir hava lisið frammi fyri kongi Judah:

25 Av tí at teir hava yvirgivið meg, og hava brent roykilsi at øðrum gudum, at teir máttu tirra meg til firtnis við øllum verkum handa sína; tí skal mín vreiði verða helt út uppá hetta plass, og skal ei verða sløkt.

26 Og hvat viðvíkur konginum av Judah, sum sendi tykkum at fregna av HARRANUM, soleiðis skulu tit siga við hann, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels *viðvíkjandi* orðunum sum tú hevurt hoyrt;

27 Av tí at títt hjarta var bleytt, og tú eyðmýktirt teg sjálvan frammi fyri Guði, tá ið tú hoyrdirt orðini hjá honum ímóti hesum plássi, og ímóti íbúgvum tess, og eyðmýktirt teg sjálvan frammi fyri mær, og skræddirt klæðir tíni, og grætst frammi fyri mær; eg havi enntá hoyrt *teg* eisini, sigur HARRIN.

28 Sí, eg vil savna teg til fedra tína, og tú skalt verða savnaður til gravar tínar í friði, eiheldur skulu eygu tíni sjá alt tað illa sum eg vil føra uppá hetta plass, og omanyvir íbúgvarnar av hinum sama. So teir bóru kongi orð aftur.

29 ¶ Tá sendi kongur og savnaði saman allar teir elstu av Judah og Jerusalem.

30 Og kongur fór niðan í hús HARRANS, og allir menninir av Judah, og íbúgvarnir av Jerusalem, og prestarnir, og Levitarnir, og alt fólkið, stór og smá: og hann las í oyru teirra øll orðini av bók sáttmálans, sum varð funnin í húsi HARRANS.

31 Og kongur stóð í plássi sínum, og gjørdi ein sáttmála frammi fyri HARRANUM, at ganga eftir HARRANUM, og at halda boðini hjá honum, og hansara vitnisburðir, og hansara ásetingar, við øllum hjarta sínum, og við allari sál síni, at útinna orðini av sáttmálanum sum eru skrivað í hesi bók.

32 Og hann elvdi øllum, sum vóru til staðar í Jerusalem og Benjamin, at standa *vegna hans.* Og íbúgvarnir av Jerusalem gjørdu samsvarandi við sáttmála Guðs, Guðs fedra sína.

33 Og Jó´-sī-ăh tók burtur allar andstygdirnar út úr øllum lands*umráðunum* sum *hoyrdu* til Ísraels barna, og fekk allar, sum vóru tilstaðar í Ísrael, at tæna, *enntá* at tæna HARRANUM Guði sínum. *Og* allar hansara dagar viku teir ikki frá at fylgja HARRANUM, Guði fedra sína.

KAPITUL 35

HARAFTURAT helt Jó´-sī-ăh eitt umleyp at HARRANUM í Jerusalem: og teir drópu umleypið á hinum fjúrtanda *degi* hins fyrsta mánaðar.

2 Og hann setti prestarnar í

teirra ásetingar, og eggjaði teimum til tænastu HARRANS húss,

3 Og segði við Levitarnar sum lærdu alt Ísrael, sum vóru heilagir at HARRANUM, Setið hina heilagu ørk í húsið sum Sálomon Dávids sonur, Ísraels kongur, bygdi; *hon skal* ei *vera* ein byrða uppiá herðum *tykkara:* tænið nú HARRANUM Guði tykkara, og hansara fólki Ísrael,

4 Og fyribúgvið *tykkum sjálvar* eftir húsum fedra tykkara, eftir skiftum tykkara, samsvarandi við skriving Dávids kongs av Ísrael, og samsvarandi við skriving Sálomons, sonar hansara.

5 Og standið í hinum heilaga *plássinum*, samsvarandi við deildirnar av familjunum hjá fedrum brøðra tykkara — fólkinum, og *eftir* deildunum av familjunum hjá Levitunum.

6 So drepið umleypið, og halgið tykkum, og fyrireikið brøður tykkara, at *teir* mega gera samsvarandi við orð HARRANS viðˆ hendi Móse.

7 Og Jó´sĭ-ăh gav til fólksins, av fylginum, lomb og geitarlomb, alt til umleyps ofrini, til alra sum vóru hjástaddir, til talið á tríati túsund, og trý túsund ungtarvar: hesir *vóru* av *figgjar*evni kongs.

8 Og hansara prinsar góvu fólkinum viljugani, til prestanna, og til Levitanna: Hĭl´-kī-ăh og Zĕch-ăr´-jăh og Jĕ´hĭ-ĕl, stjórnarar av húsi Guðs, góvu prestunum til umleyps ofrini tvey túsund og seks hundrað *smáfæ,* og trý hundrað oksar.

9 Cô-năn´-jăh eisini, og Sjĕm-aĭ´-ăh og Nĕth-á´-nēel, brøður hansara, og Hăsj-ă-bĭ´-ăh og Jē´-ĭ-ĕl og Jó´-zăb-băd, fremstir av Levitunum, góvu Levitunum til umleyps offurˇ fimm túsund *smáfæ,* og fimm hundrað oksar.

10 So tænastan varð gjørd tilreiðar, og prestarnir stóðu í plássi sínum, og Levitarnir í skiftum sínum, samsvarandi við áboðið hjá kongi.

11 Og teir drópu umleypið, og prestarnir slettu *blóðið* frá hondum sínum, og Levitarnir flettu *tey*.

12 Og teir burtfluttu brenniofrini, at teir máttu geva samsvarandi við deildirnar av familjum fólksins, at ofra at HARRANUM, eins og skrivað *stendur* í bók Mósesar. Og soleiðis *gjørdu teir* við oksarnar.

13 Og teir steiktu umleypið við eldi samsvarandi við fyriskipanina: men *hīni* heilagu *ofrini* sjóðaðu teir í pottum, og í *stórum* ketlum, og í pannum, og deildu *tey* skundisligani millum alt fólkið.

14 Og síðan gjørdu teir tilreiðar til sín sjálvs, og til prestanna: av tí at prestarnir, synir Aarons, *vóru upptiknir* í ofring av brenniofrum og feittinum inntil nátt; Levitarnir tessvegna tilreiddu til sín sjálvs, og til prestanna, sona Aarons.

15 Og sangararnir, synir Á-săph-s, *vóru* í plássi sínum, samsvarandi við áboðið hjá Dávidi, og Á-săph-i, og Hĕ-măn-i, og Jĕ-dū-thûn-i, síggjara kongs; og duravørðirnir *bíðaðu* við hvørt portrið; teir máttu ei farið avstað frá tænastu síni; tí at brøður teirra, Levitarnir, tilreiddu til teirra.

16 So øll tænasta HARRANS varð gjørd tilreiðar hin sama dagin, at halda umleypið, og at ofra brennioffurˇ uppiá altari HARRANS, samsvarandi við ábjóðan Jósĭ-ăh kongs.

17 Og børn Ísraels, sum vóru tilstaðar, hildu umleypið á teirri tíð, og hátíð ósúrgaðs breyðs sjey dagar.

18 Og tað varð einkið umleyp líkt við tað hildið í Ísrael frá døgum Sámuels prophets; eiheldur hildu allir kongarnir av Ísrael

tílíkt umleyp sum Jó-sī-ăh helt, og prestarnir, og Levitarnir, og alt Judah og Ísrael sum vóru tilstaðar, og íbúgvarnir av Jerusalem.

19 Í tí átjanda árinum av ríkjan Jó-sī-ăh varð hetta umleypið hildið.

20 ¶ Eftir alt hetta, tá ið Jó-sī-ăh hevði fyribúgvið templið, kom Nĕ-chō kongur av Egyptalandi upp at berjast ímóti Cär-chĕ-mīsj viðˆ Ĕv-phrā-tēs: og Jó-sī-ăh fór út ímóti honum.

21 Men hann sendi umboðsmenn til hansara, sigandi, Hvat havi eg at gera við teg, tú kongur av Judah? *Eg komi* ikki ímóti tær henda dag, men ímóti húsinum, hvarvið eg havi kríggj: tí at Guð ábjóðaði mær at gera skjótt: halt tær aftur frá *at blanda teg uppí hjá* Guði, sum *er* við mær, at hann oyði teg ei.

22 Hóast hetta, Jó-sī-ăh vildi ikki venda andliti sínum frá honum, men dulbúði seg, at hann mátti berjast við hann, og gav ikki gætur at orðum Nĕ-chō-s frá munni Guðs, og kom at berjast í dali Mĕ-gĭd-dō-s.

23 Og bogaskýttarnir skutu eftir Jó-sī-ăh kongi; og kongur segði til tænara sína, Havið meg burtur; tí at eg eri sára særdur.

24 Hansara tænarar tessvegna tóku hann út úr tí vagninum, og koyrdu hann í hin annan vagnin, sum hann hevði; og teir førdu hann til Jerusalem, og hann doyði, og varð jarðaður í *ēinum av* gravhýsum fedra sína. Og alt Judah og Jerusalem syrgdu yvir Jó-sī-ăh.

25 ¶ Og Jeremiah harmaði yvir Jó-sī-ăh: og allir teir syngjandi menninir og tær syngjandi kvinnurnar talaðu um Jó-sī-ăh í harmljóðum sínum til henda dag, og gjørdu tey *til* eina regluskipan í Ísrael: og sí, tey *eru* skrivað í harmljóðunum.

26 Nú, restin av gerningum Jó-sī-ăh, og hansara góðsemi, samsvarandi við *tað sum stóð* skrivað í lóg HARRANS,

27 Og hansara gerðir, fyrstar og síðstar, sí, tær *eru* skrivaðar í bók konga Ísraels og Judah.

KAPITUL 36

TÁ tóku fólk landsins Jĕ-hó-ă-hăz Jó-sī-ăh son, og gjørdu hann *til* kong í stað faðirs hansara í Jerusalem.

2 Jĕ-hó-ă-hăz *var* tjúgu og trý ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti tríggjar mánaðir í Jerusalem.

3 Og kongurin av Egyptalandi koyrdi hann frá í Jerusalem, og fordømdi landið í eitt hundrað talentum av silvuri og eini talent av gulli.

4 Og kongurin av Egyptalandi gjørdi Ē-lī-ă-kīm, bróður hansara, *til* kong yvir Judah og Jerusalem, og skifti navni hansara til Jĕ-hŏī-ă-kīm. Og Nĕ-chō tók Jĕ-hó-ă-hăz, bróður hansara, og bar hann til Egyptalands.

5 ¶ Jĕ-hŏī-ă-kīm *var* tjúgu og fimm ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti ellivu ár í Jerusalem: og hann gjørdi *hatta sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS Guðs síns.

6 Ímóti honum kom upp Nĕ-bŭ-chăd-nēz-zâr kongur av Bábylon, og bant hann í fjøtrar, til at bera hann til Bábylon.

7 Nĕ-bŭ-chăd-nēz-zâr eisini bar av reiðum HARRANS húss til Bábylon, og setti tey í tempul sítt í Bábylon.

8 Nú, restin av gerningum Jĕ-hŏī-ă-kīm-s, og hansara andstygdir sum hann gjørdi, og tað sum varð funnið í honum, sí, teir *eru* skrivaðir í bók konga Ísraels og Judah: og Jĕ-hŏī-ă-chĭn, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

9 ¶ Jĕ-hōĭ´-ă-chīn *var* átta ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti tríggjar mánaðir og tíggju dagar í Jerusalem: og hann gjørdi *hatta sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS.

10 Og tá ið árið var útrunnið, sendi Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur, og førdi hann til Bábylon, við teimum glæsiligu reiðunum av húsi HARRANS, og gjørdi Zĕd-ĕ-kī´-ăh, bróður hansara, *til* kong yvir Judah og Jerusalem.

11 ¶ Zĕd-ĕ-kī´-ăh *var* ēin og tjúgu ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og ríkti ellivu ár í Jerusalem.

12 Og hann gjørdi *hatta sum* ilt *var* í eygsjón HARRANS Guðs síns, *og* eyðmýkti ikki seg sjálvan frammi fyri Jeremiah prophetи, *talandi* frá munni HARRANS.

13 Og hann eisini gjørdi uppreist ímóti Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongi, hvør hevði fingið hann at svørja við Guð: men hann stívaði svíra sín, og herdi sítt hjarta frá at venda at HARRANUM Guði Ísraels.

14 ¶ Harumframt misbrutu allir teir fremstu av prestunum, og fólkið, sera nógv eftir øllum andstygdunum hjá teimum heidnu; og óreinkaðu hús HARRANS, sum hann hevði halgað í Jerusalem.

15 Og HARRIN Guð fedra teirra sendi til teirra við sendiboðum sínum, rísandi upp í góðari tíð, og sendandi; av tí at hann hevði várkunn yvir fólk sítt, og yvir bústað sín:

16 Men teir spottaðu sendiboðini hjá Guði, og vanvirdu orðini hjá honum, og misbrúktu prophetar hansara, inntil vreiði HARRANS reistist ímóti fólki hansara, til *har var* einkið hjálparráð.

17 Tessvegna førdi hann uppá teir kong Chăl-dē´-anna, hvør vá teirra ungu menn við svørðinum í húsi halgidóms teirra, og hevði onga várkunn yvir ungan mann, ella moyggj, gamlan mann, ella hann sum heyk vegna aldurs: hann gav *teir* allar inn í hond hansara.

18 Og øll reiðini av húsi Guðs, mikil og smá, og dýrgripirnar av húsi HARRANS, og dýrgripir kongs, og prinsa hans; allar *hesar* førdi hann til Bábylon.

19 Og teir brendu hús Guðs, og brutu niður múr Jerusalems, og brendu øll slottini harav við eldi, og oyddu øll tey glæsiligu reiðini harav.

20 Og teir, sum høvdu komist undan frá svørðinum, bar hann burtur til Bábylon; har teir vórðu tænarar fyri honum og sonum hansara inntil ríkjanina av kongadømi Persiu:

21 Til at uppfylla orð HARRANS við^ munni Jeremiah, inntil landið hevði notið hennara sabbatar: *tí at* so leingi sum hon lá oyðin, helt hon sabbat, til at uppfylla trísinstjúgu og tíggju ár.

22 ¶ Nú, í tí fyrsta árinum hjá Cýrusi kongi av Persiu, at orð HARRANS, *talað* við^ munni Jeremiah, mátti verða fullført, østi HARRIN upp anda Cýrusar kongs av Persiu, at hann gjørdi eina yvirlýsing út gjøgnum alt kongadømi sítt, og *koyrdi hana* eisini í skrift, sigandi,

23 Svá sigur Cýrus kongur av Persiu, Øll kongadømir heimsins hevur HARRIN Guð himins givið mær; og hann hevur álagt mær at byggja honum eitt hús í Jerusalem, sum *er* í Judah. Hvør *er* tykkara millum av øllum fólki hansara? HARRIN Guð hansara *veri* við honum, og lat hann fara upp.

EZRA.

KAPITUL 1

NÚ, í tí fyrsta árinum hjá Cýrusi kongi av Persiu, *fyri* at orð HARRANS viðˆ munni Jeremiah mátti verða uppfylt, østi HARRIN upp anda Cýrusar kongs av Persiu, at hann gjørdi eina yvirlýsing út gjøgnum alt kongadømi sítt, og *koyrdi hana* eisini í skrift, sigandi,

2 Svá sigur Cýrus kongur av Persiu, HARRIN Guð himins hevur givið mær øll kongadømir jarðarinnar; og hann hevur álagt mær at byggja sær eitt hús í Jerusalem, sum *er* í Judah.

3 Hvør *er* tykkara millum av øllum fólki hansara? Guð hansara veri við honum, og lat hann fara upp til Jerusalem, sum *er* í Judah, og byggja hús HARRANS Guðs Ísraels, (hann *er* Guðˇ,) sum *er* í Jerusalem.

4 Og hvørsumhelst *ið* verður verandi í nøkrum plássi, har hann *er í* útisetri, lat menninar av hansara plássi hjálpa honum við silvuri, og við gulli, og við góðsi, og við djórum, umframt fríviljaofrið til húsar Guðs, sum *er* í Jerusalem.

5 ¶ Tá risu upp teir fremstu av fedrum Judah og Benjamins, og prestarnir, og Levitarnir, við øllum *teimum* hvørs anda Guð hevði reist, at fara niðan at byggja hús HARRANS, sum *er* í Jerusalem.

6 Og allir teir, sum *vóru* um teir, styrktu hendur sínar við reiðum av silvuri, við gulli, við góðsi, og við djórum, og við dýrabærum tingum, umframt alt *sum* varð viljugliga ofrað.

7 ¶ Eisini Cýrus kongur førdi fram reiðini av HARRANS húsi, hvørji Nĕ-bū-ch̲ăd-nēz´-zâr hevði ført fram út úr Jerusalem, og hevði sett tey í hús guda sína;

8 Enntá tey førdi fram Cýrus kongur av Persiu viðˆ hendi Mĭth´-rĕ-dăth-s dýrgripameistara, og upptaldi tey at Sjĕsj´-băz-zâr-i, Judah prinsi.

9 Og hetta *er* talið á teimum: tríati føt av gulli, eitt túsund føt av silvuri, níggju og tjúgu knívar,

10 Tríati kør av gulli, silvur kør av einum næsta *slagi* fýra hundrað og tíggju, *og* onnur reiðir eitt túsund.

11 Øll reiðini av gulli og av silvuri *vóru* fimm túsund og fýra hundrað. Øll *hesi* førdi Sjĕsj´-băz-zâr niðan við *teimum av* fangaskapinum, sum vórðu førdir niðan frá Bábylon at Jerusalem.

KAPITUL 2

NÚ, hesir *eru* børn fylkisins, ið fóru niðan úr fangaskapinum, av teimum sum vóru vorðnir bornir burtur, hvørjar Nĕ-bŭ-ch̲ăd-nēz´-zâr, kongur Bábylons, hevði borið burtur at Bábylon, og komu aftur at Jerusalem og Judah, hvør *og* ein at staði sínum;

2 Hvørjir komu við Zĕ-rūb-bă´-bĕl-i: Jē´-sjû-ă, Nê-hĕ-mī´-ăh, Sĕ-rāī´-ăh, Rē-ĕl-āī´-ăh, Mŏr´-dĕ-cāī, Bilsjan, Mispar, Bĭg´-vâ-ī, Rē´-hŭm, Bā´-ă-năh. Talið á monnunum av fólki Ísraels:

3 Børn Pá´-rŏsj-ar, tvey túsund eitt hundrað sjeyti og tveir.

4 Børn Sjĕp̲h-ăt´-jăh, trý hundrað *og* sjeyti og tveir.

5 Børn Âr´-ăh, sjey hundrað *og* sjeyti og fimm.

6 Børn Pá´-hăth-mó´-ăb-s, av børnum Jē´-sjû-ă *og* Jó´-ăb-s, tvey túsund átta hundrað og tólv.

7 Børn Ē´-lăm-s, eitt túsund tvey hundrað *og* fimti og fýra.

8 Børn Zăt´-tû-s, níggju hundrað *og* fýrati og fimm.

9 Børn Zăc´-câ-ī-s, sjey hundrað og trísinstjúgu.

10 Børn Bá´-nī-s, seks hundrað *og* fjøruti og tveir.
11 Børn Bē´-bā-ī-s, seks hundrað *og* tjúgu og tríggir.
12 Børn Azgads, eitt túsund tvey hundrað *og* tjúgu og tveir.
13 Børn Ă-dō´-nī-kăm-s, seks hundrað *og* seksti og seks.
14 Børn Bĭg´-vâ-ī-s, tvey túsund fimti og seks.
15 Børn Á´-dĭn-s, fýra hundrað *og* fimti og fýra.
16 Børn Ā´-tĕr-s av Hĕz-ē-kī´-ăh, níti og átta.
17 Børn Bē´-zâ-ī-s, trý hundrað *og* tjúgu og tríggir.
18 Børn Jór´-ăh, eitt hundrað og tólv.
19 Børn Há´-sjŭm-s, tvey hundrað *og* tjúgu og tríggir.
20 Børn Gĭb´-bâr-s, níti og fimm.
21 Børn Beth-lehem-s, eitt hundrað *og* tjúgu og tríggir.
22 Menn Nê-tō´-phăh, fimti og seks.
23 Menn Án´-ă-thōth-s, eitt hundrað *og* tjúgu og átta.
24 Børn Áz-má´-vĕth-s, fjøruti og tveir.
25 Børn Kĭr´-jăth-âr´-ĭm-s, Chĕphī´-răh, og Bēēr´-ōth-s, sjey hundrað og fýrati og tríggir.
26 Børn Rá´-măh og Gē´-bŭ, seks hundrað *og* tjúgu og ēin.
27 Menn Mĭch´-măs-ar, eitt hundrað *og* tjúgu og tveir.
28 Menn Beth-el-s og Ā´-ī-s, tvey hundrað *og* tjúgu og tríggir.
29 Børn Nē´-bō-s, fimti og tveir.
30 Børn Măg´-bĭsj-ar, eitt hundrað *og* fimti og seks.
31 Børn hĭns Ē´-lăm-s, eitt túsund tvey hundrað *og* fimti og fýra.
32 Børn Hár´-ĭm-s, trý hundrað og tjúgu.
33 Børn Lōds, Há´-dĭd-s, og Ō´-nō-s, sjey hundrað *og* tjúgu og fimm.
34 Børn Jerichos, trý hundrað *og* fýrati og fimm.
35 Børn Sĕ-ná´-ăh, trý túsund og seks hundrað og tríati.
36 ¶ Prestarnir: børn Jĕ-dâ´-ăh, av húsi Jē´-sjû-ă, níggju hundrað *og* sjeyti og tríggir.
37 Børn Ĭm´-mĕr-s, eitt túsund fimti og tveir.
38 Børn Păsj´-ûr-s, eitt túsund tvey hundrað *og* fýrati og sjey.
39 Børn Hár´-ĭm-s, eitt túsund og seytjan.
40 ¶ Levitarnir: børn Jē´-sjû-ă og Kăd´-mĭ-ĕl-s, av børnum Hō-dăv´-jăh, sjeyti og fýra.
41 ¶ Sangararnir: børn Á´-săph-s, eitt hundrað *og* tjúgu og átta.
42 ¶ Børn duravørðanna: børn Sjăl´-lŭm-s, børn Ā´-tĕr-s, børn Tăl´-mŏn-s, børn Ăk´-kŭb-s, børn Há´-tĭ-tă, børn Sjō´-bâ-ī-s, *í* alt eitt hundrað *og* tríati og níggju.
43 ¶ Nĕth-ĭ-nĭm´-arnir: børn Zī´-hă, børn Hâ-sū´-phă, børn Tăb´-bâ-ōth-s,
44 Børn Kē´-rōs-ar, børn Sī´-ă-hă, børn Pá´-dŏn-s,
45 Børn Lē-bā´-năh, børn Hăg´-ă-băh, børn Ăk´-kŭb-s,
46 Børn Há´-găb-s, børn Sjăl´-mâi-s, børn Há´-năn-s,
47 Børn Gĭd´-dĕl-s, børn Gá´-hâr-s, børn Rê-âi´-ăh,
48 Børn Rē´-zĭn-s, børn Nê-kō´-dă, børn Găz´-zăm-s,
49 Børn Ūz´-zā, børn Pá´-sê-ăh, børn Bē´-sâi-s,
50 Børn Ăs´-năh, børn Mē-hū´-nĭm-s, børn Nē-phū´-sĭm-s,
51 Børn Băk´-bŭk-s, børn Hă-kū´-phă, børn Hâr´-hûr-s,
52 Børn Băz´-lŭth-s, børn Mē-hī´-dă, børn Hâr´-sjă,
53 Børn Bâr´-kōs-ar, børn Sī´-sĕ-ră, børn Thá´-măh,
54 Børn Nē´-zī-ăh, børn Há´-tĭphă.
55 ¶ Børnini hjá tænarum Sálomons: børn Sō´-tâ-ī-s, børn Sō´phē-rĕth-s, børn Pê-rū´-dă,
56 Børn Já´-ă-lăh, børn Dâr´-kŏn-s, børn Gĭd´-dĕl-s,

57 Børn Sjĕph-ăt′-jăh, børn Hăt′-tĭl-s, børn Pô-chĕ′-rĕth-s úr Zĕ′-bă-ĭm, børn Ā′-mī-s.
58 Allir Nĕth-ĭ-nĭm′-arnir, og børnini hjá tænarum Sálomons, *vóru* trý hundrað *og* níti og tveir.
59 Og hesir *vóru* teir sum fóru upp frá Tĕl′-mĕ-lăh, Tĕl′-hâr-să, Cherub, Ăd′-dăn, *og* Ĭm′-mĕr: men teir kundu ikki sýna hús faðirs síns, og sáð sítt, hvørt teir *vóru* av Ísrael:
60 Børn Dĕl-āĭ′-ăh, børn Tó′-bĭ-ăh, børn Nê-kō′-dă, seks hundrað *og* fimti og tveir.
61 ¶ Og av børnum prestanna: børn Hă-bāĭ′-ăh, børn Kôz, børn Bâr-zĭl-lā′-ĭ-s; sum tók eina ektakonu av døtrum Bâr-zĭl-lā′-ĭ-s Gileadita, og varð kallaður eftir navni teirra:
62 Hesir søktu sína skráseting *millum* teirra sum vórðu roknaðir eftir ættarskrá, men teir vórðu ikki funnir: tí vórðu teir, sum óreinkaðir, settir frá prestadøminum.
63 Og Tĭr-sjá′-thă-in segði við teir, at teir skuldu ikki eta av hinum mest heilagu tingum, til tað stóð upp ein prestur við Ū′-rĭm og við Thûm′-mĭm.
64 ¶ Øll samkoman tilsamans *var* fjøruti og tvey túsund trý hundrað *og* trísinstjúgu,
65 Umframt tænarar teirra og ternur teirra, av hvørjum *tað vóru* sjey túsund trý hundrað *og* tríati og sjey: og *tað vóru* teirra millum tvey hundrað syngjandi menn og syngjandi kvinnur.
66 Teirra hestar *vóru* sjey hundrað *og* tríati og seks; teirra múldjór tvey hundrað *og* fýrati og fimm;
67 Teirra kamelar fýra hundrað *og* tríati og fimm; *teirra* asnar seks túsund sjey hundrað og tjúgu.
68 ¶ Og *summir* av teimum fremstu av fedrunum, tá ið teir komu til húss HARRANS, sum *er* í Jerusalem, ofraðu frítt til húsar Guðs, til at seta tað upp á plássi hans:
69 Teir góvu eftir førimuni sínum innat dýrgripagoymslu arbeiðsins trísinstjúgu og eitt túsund dárikar av gulli, og fimm túsund pund av silvuri, og eitt hundrað prestaklæðir.
70 So *at* prestarnir, og Levitarnir, og *summir* av fólkinum, og sangararnir, og duravørðirnir, og Nĕth-ĭ-nĭm′-arnir, dvaldust í staðum sínum, og allur Ísrael í staðum sínum.

KAPITUL 3

OG tá ið hin sjeyndi mánaðurin var komin, og Ísraels børn *vóru* í staðunum, savnaði fólkið seg saman sum ein maður til Jerusalem.
2 Tá stóðu upp Jē′-sjû-ă Jó′-zădăk-s sonur, og hansara brøður prestarnir, og Zĕ-rūb-bá′-bĕl Sjê-ăl′-tĭ-ĕl-s sonur, og brøður hans, og bygdu altar Guðs Ísraels, at ofra brennioffurˇ hará, eins og skrivað *stendur* í lóg Móse, Guðs mansins.
3 Og teir settu altarið uppá undirstøður hans; tí at ótti *var* uppiá teimum uppá grund av fólkinum av teimum londunum: og teir ofraðu brenni-offurˇ hará at HARRANUM, *enntá* brennioffurˇ morgun og kvøld.
4 Teir hildu eisini tabernaklahátíðina, eins og skrivað *stendur,* og *ofraðu* tey dagligu brenniofrini eftir tali, samsvarandi við skikkin, sum skyldan hjá hvørjum degi kravdi;
5 Og aftaná *ofraðu* hitt áframhaldandi brennioffur, bæði nýmánanna, og alra hinna ásettu hátíða HARRANS sum vóru innvígaðar, og hjá hvørjum tí sum viljugani ofraði eitt fríviljaoffur at HARRANUM.
6 Frá tí fyrsta deginum av tí sjeynda mánaðinum byrjaðu teir

at ofra brennioffur at HARRANUM. Men grundvøllurin av templi HARRANS var ikki *enn* lagdur.

7 Teir góvu pening eisini innat múrarunum, og til træsmiðanna; og mat, og drekka, og olju, innat teimum úr Zĭ´dŏn, og til teirra úr Týrus, at føra sedristrø frá Lī´bănŏn til Joppu sævar, samsvarandi við játtanina sum teir høvdu av Cýrusi kongi av Persiu.

8 ¶ Nú, í øðrum árinum av komu teirra at húsi Guðs í Jerusalem, í øðrum mánaðinum, byrjaðu Zĕ-rūb-bá´bĕl Sjê-ăl´-tī-ĕl-s sonur, og Jē´-sjû-ă Jó´-zā-dăks sonur, og leivdin av teirra brøðrum — prestarnir og Levitarnir, og allir teir sum vóru komnir úr fangaskapinum at Jerusalem; og teir útnevndu Levitarnar, frá tjúgu ára gomlum og uppeftir, at dríva frameftir arbeiðið av HARRANS húsi.

9 Tá stóðu Jē´-sjû-ă *við* sonum sínum og brøðrum sínum, Kăd´-mī-ĕl og synir hansara, synir Judah, saman, til at dríva frameftir arbeiðsmenninar í húsi Guðs: synir Hĕn´-ă-dăd-s, *við* sonum sínum og brøðrum sínum Levitunum.

10 Og tá ið byggjararnir løgdu grundvøllin av templi HARRANS, settu teir prestarnar í teirra skarti við lúðrum, og Levitarnar — synir Á´săph-s — við glymskálum, at prísa HARRANUM, eftir fyriskipan Dávids kongs av Ísrael.

11 Og teir sungu saman eftir skifti í at prísa og veita tøkkir at HARRANUM; av tí at *hann er* góður, tí hansara miskunn *varir* um ævir mót Ísrael. Og alt fólkið rópaði við einum miklum rópi, tá ið tey prísaðu HARRANUM, av tí at grundvøllurin av húsi HARRANS var lagdur.

12 Men mangir av prestunum og Levitunum og fremstu av fedrunum, *sum vóru* avgamlir menn, sum høvdu sæð tað fyrsta húsið, tá ið grundvøllurin av hesum húsi varð lagdur frammi fyri eygum teirra, grótu við eini harðari rødd; og mangir rópaðu hart av frøi:

13 So at fólkið fekk ikki greinað ljóðið av rópinum av frøi frá ljóðinum av grátinum hjá fólkinum: tí at fólkið rópaði við einum hørðum rópi, og ljóðið hoyrdist langt burturifrá.

KAPITUL 4

NÚ, tá ið mótstandararnir hjá Judah og Benjamin hoyrdu, at børnini av fangaskapinum byggdu templið at HARRANUM Guði Ísraels;

2 Tá komu teir til Zĕ-rūb-bá´bĕl-s, og til hinna fremstu av fedrunum, og søgdu við teir, Latið okkum byggja við tykkum: tí at vit søkja Guð tykkara, eins og tit *gera;* og vit sláturofra at honum síðan dagar Ē´sâr-hăd´-dŏn-s kongs av Assur, sum førdi okkum upp higar.

3 Men Zĕ-rūb-bá´bĕl, og Jē´-sjû-ă, og restin av teimum fremstu av fedrum Ísraels, søgdu við teir, Tit hava einkið at gera við okkum at byggja eitt hús at Guði várum; men vit sjálvir saman vilja byggja at HARRANUM Guði Ísraels, eins og Cýrus kongur, kongur Persiu, hevur áboðið okkum.

4 Tá veikti fólk landsins *um* hendurnar á fólki Judah, og órógvaðu teir í at byggja,

5 Og leigaðu ráðgevarar ímóti teimum, at ampa *um* teirra ráðagerð, allar dagar Cýrusar kongs av Persiu, enntá inntil ríkjan Dá´rī-ŭs-ar kongs av Persiu.

6 Og í ríkjan Ă-hăs-vē´-rūs-ar, í byrjanini av hansara ríkjan, skrivaðu teir *honum* eina ákæru ímóti íbúgvum Judah og Jerusalems.

7 ¶ Og í døgum Ăr-tă-xĕrx´-ēs-ar skrivaðu Bĭsj´-lăm, Mĭth´-rĕ-dăth, Tăb´-ēēl, og restin av feløgum teirra, Ăr-tă-xĕrx´-ēs-i kongi av

Persiu; og skriftin av brævinum *varð* skrivað á hini Sýrisku tungu, og útløgd á hini Sýrisku tungu.

8 Rē′-hŭm ráðharri og Sjĭm′-sjâi skrivari skrivaðu eitt bræv ímóti Jerusalem til Ăr-tă-xĕrx′-ēs-ar kongs eftir hesum lagi:

9 Tá *skrivaðu* Rē′-hŭm ráðharri, og Sjĭm′-sjâi skrivari, og restin av feløgum teirra; Dī-nă-ĭt′-arnir, Ă-phâr-săth-chĭt′-arnir, Tărpĕ-lĭt′-arnir, Ă-phâr-sĭt′-arnir, Ărchĕ-vĭt′-arnir, Bábylóniarnir, Sûsăn-chĭt′-arnir, Dê-hă-vĭt′-arnir, *og* Ê-lă-mĭt′-arnir,

10 Og restin av tjóðunum sum hin mikli og tignarligi Ăsnăp′-păr førdi yvir, og setti í staðirnar av Să-mâr′-ĭ-ŭ, og restin *sum eru* hesumegin ánna, og á eini slíkari tíð.

11 ¶ Hetta *er* avritið av brævinum sum teir sendu at honum, *enntá* at Ăr-tă-xĕrx′-ēs-i kongi; Tænarar tínir, menninir hesumegin ánna, og á eini slíkari tíð.

12 Veri tað kunnugt kongi, at Jødarnir, sum komu upp frá tær til okkara, eru komnir at Jerusalem, byggjandi hin uppreistrarsama og ringa stað, og hava sett upp múrarnar *av honum,* og sameint grundvøllirnar.

13 Veri tað nú kunnugt kongi, at um hesin staður verði bygdur, og múrarnir settir upp *aftur, tá* vilja teir ikki gjalda avgjald, íkast, og toll, og *so* skalt tú skaða um inntøkuna hjá kongunum.

14 Nú, av tí at vit hava viðlíkahald frá slotti *kongs,* og tað var ikki sámiligt hjá okkum at síggja vanæru kongs, tí hava vit sent og vissað kong;

15 At kanning má verða gjørd í skrásetingabók fedra tína: so skalt tú finna í skrásetingabókini, og vita, at hesin staður *er* ein uppreistrarsamur staður, og skaðiligur hjá kongum og fylkjum, og at teir hava rørt ólæti innanfyri hin sama frá gamlari tíð: fyri hvørja grund hesin staður varð oyddur.

16 Vit vissa kong, at um hesin staður verði bygdur *aftur,* og hansara múrar settir upp, við hesum brøgdum skalt tú ongan skamt hava hesumegin ánna.

17 ¶ *Tá* sendi kongur eitt svar at Rē′-hŭm ráðharra, og *til* Sjĭm′-sjâi skrivara, og *til* restina av teirra feløgum sum búgva í Să-mâr′-ĭ-ŭ, og *at* restini handan ánna, Friður, og á eini slíkari tíð.

18 Brævið, sum tit sendu at okkum, hevur verðið týðiliga lisið frammi fyri mær.

19 Og eg ábjóðaði, og kanning hevur verðið gjørd, og tað er funnið, at hesin staðurin frá gamlari tíð hevur gjørt uppreist ímóti kongum, og *at* uppstandilsi og ólæti hava verðið gjørd harí.

20 Tað hava verið mektigir kongar eisini yvir Jerusalem, sum hava stjórnað yvir øllum *londum* handan ánna; og avgjald, íkast, og skattur, varð goldið teimum.

21 Gevið tit nú ábjóðan at elva hesum monnunum at gevast, og at hesin staður verði ikki bygdur, inntil *ein onnur* ábjóðan skal verða givin frá mær.

22 Ansið eftir nú, at tit svitist ikki at gera hetta: hví skuldi skaði vaksið til meinið hjá kongunum?

23 ¶ Nú, tá ið avritið av brævinum hjá Ăr-tă-xĕrx′-ēs-i kongi *varð* lisið frammi fyri Rē′-hŭm-i, og Sjĭm′-sjâi skrivara, og teirra feløgum, fóru teir niðan í skundi til Jerusalem at Jødunum, og fingu teir at halda uppat við makt og valdi.

24 Tá helt uppat arbeið húsar Guðs, sum *er* í Jerusalem. So tað helt uppat at øðrum árinum av ríkjan Dá′-rĭ-ŭs-ar kongs av Persiu.

KAPITUL 5

TÁ propheteraðu Hăg´-gâi prophetur, og Zĕch-ăr´-jăh Ĭd´-dō-s sonur, innat Jødunum sum *vóru* í Judah og Jerusalem í navni Guðs Ísraels, *enntá* at teimum.

2 Tá risu upp Zĕ-rūb-bá´-bĕl Sjê-ăl´-tĭ-ĕl-s sonur, og Jē´-sjû-ă Jó´-zădăk-s sonur, og byrjaðu at byggja hús Guðs sum *er* í Jerusalem: og við teimum *vóru* prophetar Guðs hjálpandi teimum.

3 ¶ Á hini somu tíð kom til teirra Tăt´-nâi, landsstjóri hesumegin ánna, og Sjē´-thâr-bŏz´-nâi, og teirra felagar, og søgdu svá við teir, Hvør hevur áboðið tykkum at byggja hetta hús, og at gera aftur henda múr?

4 Tá søgdu vit við teir eftir hesum háttarlagi, Hvørji eru nøvnini hjá monnunum sum gera henda bygning?

5 Men eyga Guðs teirra var uppá hinar elstu av Jødunum, at teir kundu ikki elva teimum at halda uppat, til málið kom til Dá´-rĭ-ŭs-ar: og tá endursendu teir svar viðvíkjandi hesum *máli.*

6 ¶ Avritið av brævinum sum Tăt´-nâi, landstjóri hesumegin ánna, og Sjē´-thâr-bŏz´-nâi, og hansara felagar — Ă-phâr-să-chĭt´-arnir, sum *vóru* hesumegin ánna, sendu Dá´-rĭ-ŭs-i kongi:

7 Teir sendu eitt bræv at honum, hvarí skrivað var svá; Dá´-rĭ-ŭs-i kongi, allur friður.

8 Veri tað kunnugt kongi, at vit fóru inn í fylki Judēu, til húsar hins mikla Guðs, sum verður bygt við miklum steinum, og timbur verður lagt í múrarnar, og hetta arbeiðið gongur skjótt áfram, og framgongur í hondum teirra.

9 Tá spurdu vit hasar elstu, *og* søgdu við teir svá, Hvør ábjóðaði tykkum at byggja hetta hús, og at gera aftur hesar múrar?

10 Vit spurdu *um* teirra nøvn eisini, at vissa teg, at vit máttu skrivað nøvnini hjá monnunum sum *vóru* hinir fremstu teirra.

11 Og soleiðis endursendu teir okkum svar, sigandi, Vit eru tænarar Guðs himins og jarðar, og byggja húsið sum varð bygt hesi mongu ár síðan, sum ein mikil kongur av Ísrael bygdi og setti upp.

12 Men eftir at okkara fedrar høvdu tirrað Guð himins at vreiði, gav hann teir inn í hondina á Nĕbŭ-chăd-nēz´-zâr-i kongi av Bábylon, Chăl-dē´-aranum, sum oyddi hetta hús, og bar fólkið burt inn í Bábylon.

13 Men í tí fyrsta árinum hjá Cýrusi kongi av Bábylon gjørdi *hin sami* Cýrus eina løgskipan at byggja hetta hús Guðs.

14 Og reiðini eisini av gulli og silvuri hjá húsi Guðs, sum Nĕbŭ-chăd-nēz´-zâr tók út úr templinum sum *var* í Jerusalem, og førdi tey inn í tempul Bábylons, tey tók Cýrus kongur út úr templi Bábylons, og tey vórðu flýggjað *ĕinum,* hvørs navn *var* Sjēsj´-băz-zâr, hvønn hann hevði gjørt *til* landsstjóra;

15 Og segði við hann, Tak hesi reiðini, far, ber tey inn í templið sum *er* í Jerusalem, og lat hús Guðs verða bygt í plássi hans.

16 Tá kom hin sami Sjēsj´-băzzâr, *og* legði grundvøllin av húsi Guðs, sum *er* í Jerusalem: og síðan ta tíð, enntá inntil nú, hevur tað verið í bygging, og *enn* er tað ikki fullført.

17 Nú tessvegna, um *tað tyki* gott fyri kongi, lat rannsókn verða gjørda í kongsins dýrgripahúsi, sum *er* har í Bábylon, hvørt tað veri *so,* at ein løgskipan varð gjørd av Cýrusi kongi at byggja hetta hús Guðs í Jerusalem, og lat kong senda vild sína til okkara viðvíkjandi hesum máli.

KAPITUL 6

TÁ gjørdi Dá´-rĭ-ŭs kongur eina løgskipan, og rannsókn varð gjørd í húsi rullnanna, har dýrgripirnir vóru lagdir niðurfyri í Bábylon.

2 Og tað varð funnin í Ăch-mē´-thŭ, í slottinum sum *er* í fylki Medanna, ein rulla, og harí *var* ein skráseting svá skrivað:

3 Í tí fyrsta árinum hjá Cýrusi kongi, gjørdi *hin sami* Cýrus kongur eina løgskipan *viðvíkjandi* húsi Guðs í Jerusalem, Latið húsið verða bygt, plássið har teir ofraðu sláturoffurˇ, og latið grundvøllir tess verða sterkliga lagdar; hædd tess trísinstjúgu alnir, *og* breidd tess trísinstjúgu alnir;

4 *Við* trimum røðum av miklum steinum, og eini rød av nýggjum timbri: og latið útreiðslurnar verða givnar út úr húsi kongsins:

5 Og eisini latið tey gyltu og silvur reiðini av húsi Guðs, sum Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr tók fram út úr templinum sum *er* í Jerusalem, og førdi at Bábylon, verða endurveitt, og førd aftur at templinum sum *er* í Jerusalem, *hvørt og ēitt* til pláss sítt, og staðsetið *tey* í húsi Guðs.

6 Nú *tessvegna,* Tăt´-nâi, landsstjóri handan ánna, Sjē´-thâr-bōz´-nâi, og tykkara felagar — Ă-phâr-să-chīt´-arnir, sum *eru* handan ánna, verið tit fjart haðani frá:

7 Latið arbeiðið av hesum húsi Guðs vera; latið landsstjóran hjá Jødunum og hinar eldru hjá Jødunum byggja hetta hús Guðs í plássi hans.

8 Harafturat geri eg eina løgskipan, hvat tit skulu gera við hinar elstu hjá hesum Jødunum fyri byggingina av hesum húsi Guðs: at av ognum kongsins, *enntá* av íkastinum handan ánna, alt fyri eitt útreiðslur verði givnar hesum monnum, at teir verði ikki hindraðir.

9 Og tað sum teir hava tørv á, bæði ungum ungtarvum, og veðrum, og lombum, til brennioffurˇ Guðs himins, hveiti, salt, vín, og olju, samsvarandi við tilskilan prestanna sum *eru* í Jerusalem, latið tað verða givið teimum dag um dag uttan svit:

10 Át teir mega ofra sláturoffurˇ av søtum angilsum at Guði himins, og biðja fyri lívi kongs, og sona hans.

11 Eisini havi eg gjørt eina løgskipan, at hvørsumhelst *ið* skal broyta hetta orðið, lat timbur verða hálað niður frá húsi hans, og, verðandi sett upp, lat hann verða hongdan hará; og lat hús hansara verða gjørt ein tøðrúgva fyri hetta.

12 Og tann Guð, sum hevur elvt navni sínum at dvøljast har, oyði allar kongar og fólk, sum skulu seta til handar sínar at broyta *og* at oyða hetta hús Guðs, sum *er* í Jerusalem. Eg, Dá´-rĭ-ŭs, havi gjørt eina løgskipan; latið hana verða inta við bræði.

13 ¶ Tăt´-nâi, landsstjóri hesumegin ánna, Sjē´-thâr-bōz´-nâi, og teirra felagar, samsvarandi við tað sum Dá´-rĭ-us kongur hevði sent, teir tá so gjørdu bræðisligani.

14 Og hinir elstu hjá Jødunum bygdu, og teir framgingu gjøgnum prophetering Hăg´-gâi prophets og Zĕch-ăr´-jăh Id´-dō-s sonar. Og teir bygdu, og fullførdu *tað,* samsvarandi við áboðið hjá Guði Ísraels, og samsvarandi við áboðið hjá Cýrusi, og Dá´-rĭ-ŭs-i, og Ăr-tă-xĕrx´-ēs-i kongi av Persiu.

15 Og hetta húsið varð fullført á tí triðja deginum av mánaðinum Ă´-dâr, sum var í tí sætta árinum av ríkjan Dá´-rĭ-ŭs-ar kongs.

16 ¶ Og børn Ísraels, prestarnir, og Levitarnir, og restin av børnum fangaskapsins, hildu innvígingina av hesum húsi Guðs við gleði,
17 Og ofraðu við innvígingina av hesum húsi Guðs eitt hundrað ungtarvar, tvey hundrað veðrar, fýra hundrað lomb; og til eitt syndoffur fyri alt Ísrael tólv geitarbukkar, samsvarandi við talið av ættargreinum Ísraels.
18 Og teir settu prestarnar í teirra avdeilingar, og Levitarnar í teirra skiftir, til tænastu Guðs, sum *er* í Jerusalem; eins og skrivað stendur í bók Mósesar.
19 Og børn fangaskapsins hildu umleypið uppá hin fjúrtanda *dag* hins fyrsta mánaðar.
20 Tí at prestarnir og Levitarnir vóru skírgaðir tilsaman, allir av teimum *vóru* skírir, og drópu umleypið fyri øll børn fangaskapsins, og fyri sínar brøður — prestarnar, og fyri seg sjálvar.
21 Og børn Ísraels, sum vóru komnir aftur út úr fangaskapi, og allir slíkir sum høvdu atskilt seg sjálvar at teimum frá gravskitni hinna heidnu landsins, til at søkja HARRAN Guð Ísraels, ótu,
22 Og hildu hátíðina av ósúrgaðum breyði sjey dagar við gleði: tí at HARRIN hevði gjørt teir frøifullar, og vent hjarta kongsins av Assýriu at teimum, til at styrkja teirra hendur í arbeiði húsar Guðs, Ísraels Guðs.

KAPITUL 7

NÚ, eftir hesar lutir, í ríkjan Ăr-tă-xĕrx´-ēs-ar kongs av Persiu, *fór* Ezra, sonur Sĕ-rāĭ´-ăh, sonar Ă-zăr´-jăh, sonar Hĭl´-kĭ-ăh,
2 Sonar Sjăl´-lŭm-s, sonar Zā´-dŏk-s, sonar Á-hĭ-tūb-s,
3 Sonur Ă-măr´-jăh, sonar Â-zăr´-jăh, sonar Mĕ-rāĭ´-ōth-s,
4 Sonar Zĕr-ă-hī´-ăh, sonar Ŭz´-zī-s, sonar Bŭk´-kī-s,
5 Sonar Ă-bĭ-sjū´-ă, sonar Phī´-nĕ-hăs-ar, sonar Ĕl-ĕ-ā´-zâr-s, sonar Aarons hins fremsta prests:
6 Hesin Ezra fór upp frá Bábylon; og hann *var* ein førur skriftlærdur í lóg Mósesar, sum HARRIN Guð Ísraels hevði givið: og kongur veitti honum allan fyrispurning hans, samsvarandi við hond HARRANS Guðs hans uppiá honum.
7 Og tað fóru upp *summir* av børnum Ísraels, og av prestunum, og Levitunum, og sangarunum, og duravørðunum, og Nĕth-ĭ-nĭm´-unum, at Jerusalem, í tí sjeynda árinum hjá Ăr-tă-xĕrx´-ēs-i kongi.
8 Og hann kom til Jerusalem í tí fimta mánaðinum, sum *var* í tí sjeynda árinum hjá kongi.
9 Tí uppá hin fyrsta *dag* hins fyrsta mánaðar byrjaði hann at fara upp frá Bábylon, og á hinum fyrsta *degi* hins fimta mánaðar kom hann til Jerusalem, samsvarandi við hina góðu hond Guðs hans uppiá honum.
10 Tí at Ezra hevði fyrireikað sítt hjarta at søkja lóg HARRANS, og at gera *hana,* og at frálæra í Ísrael ásetingar og dómar.
11 ¶ Nú, hetta *er* avritið av brævinum, sum kongurin Ăr-tă-xĕrx´-ēs gav Ezra presti, hinum skriftlærda, *enntá* ein skriftlærdur hjá orðunum av boðum HARRANS, og hjá ásetingum hans til Ísraels.
12 Ăr-tă-xĕrx´-ēs, kongur konga, Ezra presti, einum skriftlærdum lógar Guðs himins, fullkomnan *frið,* og á eini slíkari tíð.
13 Eg geri eina løgskipan, at allir teir av fólki Ísraels, og *av* hansara prestum og Levitum, í ríki mínum, sum eru hugaðir av sínum egna fría vilja at fara upp til Jerusalem, fari við tær.
14 Eftirsum at tú ert sendur av kongi, og av hansara sjey ráðgevum, at fregna viðvíkjandi

Judah og Jerusalem, samsvarandi við lóg Guðs tíns, sum *er* í hond tíni;

15 Og at bera silvurið og gullið, sum kongur og hansara ráðgevar hava frælsliga ofrað Guði Ísraels, hvørs bústaður *er* í Jerusalem,

16 Og alt silvurið og gullið, sum tú kanst finna í øllum fylki Bábylons, við fríviljaofri fólksins, og prestanna, ofrandi viljugligani til húsar Guðs teirra, sum *er* í Jerusalem:

17 At tú mást keypa skundisligani við hesum peningi ungtarvar, veðrar, lomb, við teirra matofrum og teirra drykkofrum, og ofra tey uppiá altari húsar Guðs tykkara, sum *er* í Jerusalem.

18 Og hvatsumhelst *ið* skal tykjast gott fyri tær, og fyri brøðrum tínum, at gera við restina av silvrinum og gullinum, tað gerið eftir vilja Guðs tykkara.

19 Reiðini eisini, sum eru givin tær til tænastu húsar Guðs tíns, *tey* avhendi tú frammi fyri Guði Jerusalems.

20 Og hvatsumhelst meira *ið* skal vera tørviligt til húsar Guðs tíns, sum tú skalt hava høvi til at veita, veit *tað* út úr dýrgripahúsi kongs.

21 Og eg, *enntá* eg, Ăr-tă-xĕrx´-ēs kongur, geri eina løgskipan til alra dýrgripameistaranna sum *eru* handan ánna, at hvatsumhelst *ið* Ezra prestur, hin skriftlærdi lógar Guðs himins, skal krevja av tykkum, tað verði gjørt skundisligani,

22 At eitt hundrað talentum av silvuri, og til eitt hundrað mál av hveiti, og til eitt hundrað bāth av víni, og til eitt hundrað bāth av olju, og salt uttan at fyriskriva *hvussu mikið*.

23 Hvatsumhelst *ið* er áboðið av Guði himins, lat tað verða dúgliga gjørt fyri hús Guðs himins: tí at hví skuldi tað verið vreiði ímóti ríki kongs og sona hans?

24 Eisini vissa vit tykkum, at varðandi nakrar av prestunum og Levitunum, sangarunum, duravørðunum, Nĕth-ĭ-nīm´-unum, ella tænarunum hjá hesum húsi Guðs, skal tað ikki vera lógligt at áleggja avgjald, íkast, ella toll, uppá teir.

25 Og tú, Ezra, eftir vísdómi Guðs tíns, sum *er* í hond tíni, set stýrismenn og dómarar, sum mega døma alt fólkið sum *eru* handan ánna; allar slíkar sum kenna lógir Guðs tíns; og lærið tit teir sum kenna *tær* ikki.

26 Og hvørsumhelst *ið* vil ikki gera lóg Guðs tíns, og lóg kongs, lat dóm verða útintan skundisligani uppá hann, hvørt *tað veri seg* at deyða, ella til burtvísingar, ella til inndragingar av ognarlutum, ella til fongslanar.

27 ¶ Vælsignaður *veri* HARRIN Guð fedra vára, sum hevur lagt *slíkan lut* sum henda í hjarta kongs, at fríðka hús HARRANS, sum *er* í Jerusalem:

28 Og hevur framlongt miskunn at mær frammi fyri kongi, og ráðgevum hans, og frammi fyri øllum kongsins mektigu prinsum. Og eg varð styrktur, sum hond HARRANS Guðs míns *var* uppiá mær, og eg savnaði saman burtur úr Ísrael fremstar menn at fara upp við mær.

KAPITUL 8

HESIR *eru* nú hinir fremstu hjá fedrum teirra, og *hetta er* ættartal teirra sum fóru upp við mær frá Bábylon, í ríkjan Ăr-tă-xĕrx´-ēs-ar kongs.

2 Av sonum Phī´-nĕ-hăs-ar; Gĕr´-sjǒm: av sonum Ĭth´-ă-mâr-s; Dániel: av sonum Dávids; Hăt´-tūsj.

3 Av sonum Sjĕch-ăn´-jăh, av sonum Phâr´-ŏsj-ar; Zĕch-ăr´-jăh: og við honum vórðu roknaðir

eftir ættartali hjá hannunum eitt hundrað og fimti.

4 Av sonum Pá´-hăth-mó´-ăb-s; Ĕ-lī-hō´-ē-naî Zĕr-ă-hī´-ăh sonur, og við honum tvey hundrað hannar.

5 Av sonum Sjĕch-ăn´-jăh; sonur Jă-há´-zī-ĕl-s, og við honum trý hundrað hannar.

6 Av sonunum eisini hjá Á´-dĭn; Ē´-bĕd Jónathans sonur, og við honum fimti hannar.

7 Og av sonum Ē´-lăm-s; Jĕ-sjaî´-ăh Ăth-ăl´-jŭh sonur, og við honum sjeyti hannar.

8 Og av sonum Sjĕph-ăt´-jăh; Zĕb-ă-dī´-ăh Michaels sonur, og við honum fýrsinstjúgu hannar.

9 Av sonum Jó´-ăb-s; Ó-bă-dī´-ăh Jē´-hī-ĕl-s sonur, og við honum tvey hundrað og átjan hannar.

10 Og av sonum Sjĕ-lō´-mĭth-s; sonur Jó-sī-phī´-ăh, og við honum eitt hundrað og trísinstjúgu hannar.

11 Og av sonum Bē´-bā-ī-s; Zĕch-ăr´-jăh Bē´-bā-ī-s sonur, og við honum tjúgu og átta hannar.

12 Og av sonum Azgads; Jó´-hâ-năn Hăk´-kă-tăn-s sonur, og við honum eitt hundrað og tíggju hannar.

13 Og av hinum síðstu sonum Ă-dó´-nī-kăm-s, hvørs nøvn *eru* hesi, Ê-lĭph´-ē-lĕt, Jē´-ī-ĕl, og Sjĕm-aî´-ăh, og við teimum trísinstjúgu hannar.

14 Av sonunum eisini hjá Bĭg´-vâ-ī; Ū´-thaî, og Zăb´-bŭd, og við teimum sjeyti hannar.

15 ¶ Og eg savnaði teir saman til ánna sum rennur til Ă-hā´-vă; og har vórðu vit í tjøldum tríggjar dagar: og eg skoðaði fólkið, og prestarnar, og fann har ongar av sonum Levīs.

16 Tá sendi eg eftir Êl-ī-ē´-zĕr-i, og eftir Ár´-ī-ĕl-i, eftir Sjĕm-aî´-ăh, og eftir Ēl´-nâ-thăn-i, og eftir Já´-rĭb-i, og eftir Ēl´-nâ-thăn-i, og eftir Náthani, og eftir Zĕch-ăr´-jăh, og eftir Mĕ-sjŭl´-lăm-i, fremstum monnum; eisini eftir Jōī´-ă-rĭb-i, og eftir Ēl´-nâ-thăn-i, skilamonnum.

17 Og eg sendi teir við ábjóðan at Ĭd´-dō, hinum fremsta, við plássið Căs-ī-phī´-ă, og eg segði teimum hvat teir skuldu siga við Ĭd´-dō, *og* til brøðra hans, Nĕth-ī-nīm´-anna, við plássið Căs-ī-phī´-ă, at teir skuldu føra at okkum tænarar fyri hús Guðs várs.

18 Og viðˆ hini góðu hond Guðs várs uppiá okkum førdu teir okkum ein skilamann, av sonum Mâh´-lī-s, syni Levīs, syni Ísraels; og Sjĕr-ĕ-bī´-âh, við sonum hans og brøðrum hans, átjan;

19 Og Hăsj-ă-bī´-ăh, og við honum Jĕ-sjaî´-ăh av sonum Mĕ-râr´-ī-s, brøður hans og synir teirra, tjúgu;

20 Eisini av Nĕth-ī-nīm´-unum, hvørjar Dávid og prinsarnir høvdu útnevnt til tænastuna hjá Levitunum, tvey hundrað og tjúgu Nĕth-ī-nīm´-ar: allir av teimum vóru úttryktir við navni.

21 ¶ Tá lýsti eg eina føstu har, við Ă-hā´-vă ánna, at vit máttu níva okkum frammi fyri Guði várum, at søkja av honum ein rættan veg til okkara, og til hini smáu okkara, og til alt *figgjar*evni várt.

22 Tí eg skammaðist at krevja av kongi eitt lið av hermonnum og hestmonnum at hjálpa okkum ímóti figgindanum á veginum: av tí at vit høvdu talað við kong, sigandi, Hond Guðs várs *er* uppiá øllum teimum til gott, sum søkja hann; men hansara máttur og hansara vreiði *er* ímóti øllum teimum sum yvirgeva hann.

23 So vit fastaðu og heittu á Guð okkara fyri hetta: og hann varð bønaður av okkum.

24 ¶ Tá atskildi eg tólv av teimum fremstu av prestunum, Sjĕr-ĕ-bī´-âh, Hăsj-ă-bī´-ăh, og tíggju av brøðrum teirra við teimum,

25 Og vigaði teimum silvurið, og gullið, og reiðini, *enntá* offur

húsar Guðs várs, hvørt kongur, og ráðgevar hans, og ráðharrar hans, og allur Ísrael *har* tilstaðar, høvdu ofrað:

26 Eg enntá vigaði at teirra hond seks hundrað og fimti talentir av silvuri, og silvur íløt eitt hundrað talentir, *og* av gulli eitt hundrað talentir;

27 Eisini tjúgu kør av gulli, til eitt túsund dárikar; og tvey íløt av fínum messingi, dýrabær sum gull.

28 Og eg segði við teir, Tit *eru* heilagir HARRANUM; reiðini *eru* heilag eisini; og silvurið og gullið *eru* eitt fríviljaoffur at HARRANUM Guði fedra tykkara.

29 Vakið tit, og varðið *tey,* inntil tit viga *tey* frammi fyri hinum fremstu av prestunum og Levitunum, og fremstu av fedrum Ísraels, í Jerusalem, í kømrunum av húsi HARRANS.

30 So tóku prestarnir og Levitarnir vektina á silvrinum, og gullinum, og íløtunum, til at føra *tey* til Jerusalem at húsi Guðs várs.

31 ¶ Síðan fóru vit avstað frá Ă-hā′-vă-s ánni á tí tólvta *deginum* av tí fyrsta mánaðinum, til at fara at Jerusalem: og hond Guðs várs var uppiá okkum, og hann bjargaði okkum frá hondini á fíggindanum, og á slíkum sum lógu á lúri eftir veginum.

32 Og vit komu til Jerusalem, og vórðu har tríggjar dagar.

33 ¶ Nú, á tí fjórða deginum vórðu silvurið og gullið og íløtini vigaði í húsi Guðs várs við hendi Mĕr′-ē-mōth-s Ū′-rī-ăh sonar prests; og við honum *var* Ĕl-ē-ā′-zâr Phĭ′-nē-hăs-ar sonur; og við teimum *var* Jó′-zăd-băd Jē′-sjû-ă sonur, og Nó-ăd-jăh Bĭn′-nû-ĭ-s sonur, Levitar;

34 Eftir nummari *og* eftir vekt av hvørjum *og* ēinum: og øll vektin varð skrivað á teirri tíð.

35 *Eisini* børnini hjá teimum sum høvdu verðið bornir burtur, sum vóru komnir út úr fangaskapinum, ofraðu brennioffur at Guði Ísraels, tólv ungtarvar fyri allan Ísrael, níti og seks veðrar, sjeyti og sjey lomb, tólv geitabukkar *til* eitt syndoffur: alt *hetta var* eitt brennioffur at HARRANUM.

36 ¶ Og teir flýggjaðu fulltrúanir kongs at varayvirmonnum kongs, og til landsstjóranna hesumegin ánna: og teir dugnaðu fólkinum, og húsi Guðs.

KAPITUL 9

NÚ, tá ið hesi tingini vóru gjørd, komu prinsarnir til mín, sigandi, Fólk Ísraels, og prestarnir, og Levitarnir, hava ikki atskilt seg sjálvar frá fólki landanna, *gerandi* samsvarandi við andstygdir teirra, *enntá* Cănaanitanna, Hittitanna, Pê-rĭz-zĭt′-anna, Jĕb-ū-sĭt′-anna, Ammonitanna, Móabitanna, Egyptanna, og Amoritanna.

2 Tí at teir hava tikið av teirra døtrum til sín sjálvs, og til sona sína: so at hitt heilaga sáð hava blandað seg sjálvar við fólkið av *teimum* londunum: ja, hondin hjá prinsunum og stjórnarunum hevur verið fremst í hesum misbroti.

3 Og tá ið eg hoyrdi henda lut, skræddi eg klæði mítt og kappa mín, og sleit av hár høvurs míns og skeggs míns, og settist niður ógvaður.

4 Tá vórðu flykkjaðir at mær hvør tann sum nøtraði við orðini hjá Guði Ísraels, uppá grund av misbroti teirra sum høvdu verðið bornir burtur; og eg sat ógvaður inntil kvøld sláturofrið.

5 ¶ Og við kvøld sláturofrið reistist eg upp frá míni tyngd; og, havandi skrætt klæði mítt og kappa mín, fell eg uppá míni knø, og breiddi út mínar hendur at HARRANUM Guði mínum,

6 Og segði, O Guð mín, eg skammist og rodni at lyfta upp andlit mítt til tín, Guð mín: tí at várar misgerðir eru øktar yvir høvur *várt,* og várt misbrot er vaksið upp at himnunum.

7 Síðan dagar fedra vára *hava* vit *verið* í einum miklum misbroti at hesum degi; og fyri várar misgerðir hava vit, kongar várir, *og* prestar várir, verðið flýggjaðir inn í hondina á kongum landanna, til svørðsins, til fangaskaps, og til herfongs, og til ørkymlanar av andliti, eins og *tað er* henda dag.

8 Og nú í eitt lítið bil hevur náði verðið *sýnd* frá HARRANUM Guði várum, at eftirlata okkum eina leivd at komast undan, og at geva okkum ein nagla í heilaga plássi hans, at Guð vár má lýsna vári eygu, og geva okkum eitt sindur av endurlívgan í trældómi várum.

9 Tí at vit *vóru* trælmenn; vár Guð tó hevur ikki yvirgivið okkum í trældómi várum, men hevur framlongt miskunn at okkum í eygsjónini á kongum Persiu, at geva okkum eina endurlívgan, at seta upp hús Guðs várs, og at væla um oyðingar tess, og at geva okkum ein múr í Judah og í Jerusalem.

10 Og nú, O Guð vár, hvat skulu vit siga eftir hetta? tí at vit hava yvirgivið boð tíni,

11 Hvørji tú hevurt áboðið við tænarum tínum prophetunum, sigandi, Landið, at hvørjum tit fara til *tess* at ognast tað, er eitt óreint land við gravskitnini hjá fólki landanna, við teirra andstygdum, sum hava fylt tað frá ēinum enda til annan við síni óreinsku.

12 Nú tessvegna, gevið ikki tykkara døtur at sonum teirra, eiheldur takið døtur teirra at sonum tykkara, ella søkið teirra frið ella teirra ríkdóm um ævir: at tit mega vera sterkir, og eta hitt góða landsins, og eftirlata *tað* til ein arv til barna tykkara um ævir.

13 Og eftir alt sum er komið omanyvir okkum fyri illu gerðir várar, og fyri mikla misbrot várt, við tað at tú, Guð vár, hevurt revsað okkum minni enn várar misgerðir *eiga uppiborið,* og hevurt givið okkum *slíka* útfrían sum hesa;

14 Skuldu vit aftur brotið boðini hjá tær, og einst í mágskap við fólkið av hesum andstygdum? vildirt tú ei verðið firtin við okkum, til tú hevðirt upptært *okkum,* so at *tað* eingin leivd *hevði verðið* ella undankoming?

15 O HARRI Guð Ísraels, tú *ert* rættvísur: tí at vit eru verandi enn komnir undan, eins og *tað er* henda dag: sí, vit *eru* frammi fyri tær í misbrotum várum: tí at vit kunnu ikki standast frammi fyri tær uppá grund av hesum.

KAPITUL 10

NÚ, tá ið Ezra hevði biðið, og tá ið hann hevði játtað, grátandi og kastandi seg niður frammanfyri húsi Guðs, flykkjaðist at honum burtur úr Ísrael ein sera mikil samkoma av monnum og kvinnum og børnum: tí at fólkið græt sera sárt.

2 Og Sjěch-ăn´-jăh Jē´-hĭ-ĕl-s sonur, *ēin* av sonum Ē´-lăm-s, tók til máls og segði við Ezra, Vit hava misbrotist ímóti Guði várum, og hava tikið fremmandar ektakonur av fólki landsins: tó nú er tað vón í Ísrael viðvíkjandi hesum luti.

3 Nú tessvegna, latum okkum gera ein sáttmála við Guð váran *um* at koyra burtur allar ektakonurnar, og slík sum eru fødd av teimum, samsvarandi við ráðið hjá harra mínum, og hjá teimum ið nøtra við boðið hjá Guði várum; og lat tað verða gjørt samsvarandi við lógina.

4 Reis *teg;* tí at *hetta* mál *tilhoyrir* tær: vit eisini *vilja vera* við tær: ver av góðum treysti, og ger *tað*.
5 Tá reistist Ezra, og fekk teir fremstu prestarnar, Levitarnar, og allan Ísrael, at svørja, at teir skuldu gera samsvarandi við hetta orðið. Og teir svóru.
6 ¶ Tá reis Ezra upp frammanfyri ífrá húsi Guðs, og fór inn í herbergið hjá Jó´-hâ-nân Ē´-lī-ăsjīb-s syni: og *tá ið* hann kom hagar, át hann einkið breyð, ella drakk vatn: tí hann syrgdi uppá grund av brotinum hjá teimum ið høvdu verðið bornir burtur.
7 Og teir gjørdu yvirlýsing út gjøgnum Judah og Jerusalem at øllum børnum fangaskapsins, at teir skuldu savna seg saman at Jerusalem;
8 Og at hvørsumhelst *ið* vildi ikki koma innanfyri tríggjar dagar, samsvarandi við ráðið hjá prinsunum og teimum elstu, alt hansara *figgjar*evni skuldi verða hald lagt á, og sjálvur hann atskildur frá samkomu teirra sum høvdu verðið bornir burtur.
9 ¶ Tá savnaðu allir menninir av Judah og Benjamin seg saman at Jerusalem innanfyri tríggjar dagar. Tað *var* hin níggjundi mánaður, á hinum tjúgunda *degi* mánaðarins; og alt fólkið sat í stræti húsar Guðs, nøtrandi uppá grund av *hesum* máli, og fyri hitt mikla regn.
10 Og Ezra prestur stóð upp, og segði við teir, Tit hava brotist, og hava tikið fremmandar ektakonur, at økja *um* misbrot Ísraels.
11 Nú tessvegna, gerið játtan at HARRANUM Guði fedra tykkara, og gerið fragd hansara: og atskiljið tykkum sjálvar frá fólki landsins, og frá teimum fremmandu ektakonunum.
12 Tá svaraði øll samkoman og segði við eini harðari rødd, Sum tú hevurt sagt, so mugu vit gera.
13 Men fólkið *eru* mangir, og *tað er* ein tíð av nógvum regni, og vit eru ikki førir fyri at standa uttanfyri, eiheldur *er hetta* eitt verk av ēinum degi ella tveimum: tí at vit eru mangir sum hava brotist í hesum luti.
14 Lat nú okkara stjórnarar av allari samkomuni standa, og lat allar teir, sum hava tikið fremmandar ektakonur í staðum várum, koma til ásettar tíðir, og við teim hinir elstu av hvørjum staði, og dómarar hans, inntil hin grimma vreiði Guðs várs fyri hetta mál verði vend frá okkum.
15 ¶ Einans Jónathan Ás´-ăhĕl-s sonur og Jâ-hă-zí´-ăh Tĭk´-văh sonur vóru upptiknir kring hetta *mál:* og Mĕ-sjŭl´-lăm og Sjăb´-bĕthâi Leviti hjálptu teimum.
16 Og børnini av fangaskapinum so gjørdu. Og Ezra prestur, *við* ávísum fremstum av fedrunum, eftir húsi fedra teirra, og allir av teimum eftir nøvnum *teirra,* vórðu atskildir, og settust niður í hinum fyrsta degi hins tíggjunda mánaðar at kanna málið.
17 Og teir gjørdu *seg* lidnar við allar menninar, sum høvdu tikið fremmandar ektakonur, við hin fyrsta dag hins fyrsta mánaðar.
18 ¶ Og millum prestasynirnar vórðu tað funnir sum høvdu tikið fremmandar ektakonur: *nevniliga,* av sonum Jē´-sjû-ă Jó´-zā-dăk-s sonar, og brøðrum hans; Mā-ăsēj´-ăh, og Êl-ī-ē´-zĕr, og Já´-rīb, og Gĕ-dăl´-jăh.
19 Og teir góvu hendur sínar *um* at teir vildu koyra burtur ektakonur sínar; og, *verandi* sekir, *ofraðu teir* ein veðr av fylginum fyri brot sítt.
20 Og av sonum Ĭm´-mĕr-s; Hănā´-nī, og Zĕb-ă-dī´-ăh.
21 Og av sonum Hár´-ĭm-s; Mā-ă-sēj´-ăh, og Ê-lī´-jăh, og Sjĕm-aí´-ăh, og Jē´-hī-ĕl, og Ūz´-zī-ăh.

22 Og av sonum Păsj´ûr-s; Ĕ-lī-ō´-ĕ-naî, Mā-ă-sĕj´-ăh, Ísj´-mâ-ĕl, Nĕth-á´-nēēl, Jó´-zā-băd, og Ēl-á´-săh.
23 Eisini av Levitunum; Jó´-zā-băd, og Sjĭm´-ĕ-ī, og Kê-lâî´-ăh, (hin sami *er* Kê-lī´-tă,) Pēth-ă-hī´-ăh, Judah, og Êl-ī-ē´-zĕr.
24 Av sangarunum eisini; Ē´-lĭ-ăsj-ĭb: og av duravørðunum; Sjăl´-lŭm, og Tē´-lĕm, og Ū´-rī.
25 Harafturat av Ísrael: av sonum Pá´-rŏsj-ar; Rá´-mī-ăh, og Jê-zī´-ăh, og Măl´-chī-âh, og Mī´-ă-mĭn, og Ĕl-ē-ā´-zâr, og Măl-chī´-jăh, og Bĕ-naî´-ăh.
26 Og av sonum Ē´-lăm-s; Măt-tă-nī´-ăh, Zĕch-ăr´-jăh, og Jē´-hĭ-ĕl, og Abdī, og Jĕr´-ē-mōth, og Ē-lī´-ăh.
27 Og av sonum Zăt´-tû-s; Ē-lī-ō´-ĕ-naî, Ē´-lī-ăsj-ĭb, Măt-tă-nī´-ăh, og Jĕr´-ē-mōth, og Zā´-băd, og Ă-zī´-zā.
28 Av sonum eisini Bē´-bā-ī-s; Jē-hó´-hă-năn, Hă-năn´-jăh, Zăb-bâ-ī, *og* Ăth-lā´-ī.
29 Og av sonum Bá´-nī-s; Mē-sjŭl´-lăm, Măl´-lŭch, og Ă-dâî´-ăh, Já´-sjŭb, og Sjē´-ăl, og Rá´-mōth.
30 Og av sonum Pá´-hăth-mó´-ăb-s; Adna, og Chē´-lăl, Bĕ-naî´-ăh, Mā-ă-sĕj´-ăh, Măt-tă-nī´-ăh, Bĕz-á´-lēēl, og Bĭn´-nû-ī, og Mă-năs´-sēh.
31 Og *av* sonum Hár´-ĭm-s; Êl-ĭ-ē´-zĕr, Ĭsj-ī´-jăh, Măl´-chī-âh, Sjĕm-âî´-ăh, Sjĭm´-ē-ōn,
32 Benjamin, Măl´-lŭch, *og* Sjĕm-ă-rī´-ăh.
33 Av sonum Há´-sjŭm-s; Măt-tē´-naî, Măt´-tă-thăh, Zā´-băd, Ē-lĭph´-ĕ-lĕt, Jĕr-ē-mā´-ī, Mă-năs´-sēh, *og* Sjĭm´-ē-ī.
34 Av sonum Bá´-nī-s; Má-ă-dā´-ī, Amram, og Ū´-ĕl,
35 Bē-naî´-ăh, Bē-dĕj´-ăh, Chĕl´-lŭh,
36 Vă-nī´-ăh, Mĕr´-ē-mōth, Ē´-lī-ăsj-ĭb,
37 Măt-tă-nī´-ăh, Măt-tē´-naî, og Jā´-ă-saû,
38 Og Bá´-nī, og Bĭn´-nû-ī, Sjĭm´-ē-ī,
39 Og Sjĕl-ē-mī´-ăh, og Náthan, og Ă-dâî´-ăh,
40 Măch-năd´-ē-bâî, Sjá´-sjâî, Sjá´-râ-ī,
41 Â-zá´-rēēl, og Sjĕl-ē-mī´-ăh, Sjĕm-ă-rī´-ăh,
42 Sjăl´-lŭm, Ă-măr´-jăh, *og* Jó-seph.
43 Av sonum Nē´-bō-s; Jē´-î-ĕl, Măt-tī-thī´-ăh, Zā´-băd, Zē-bī´-nă, Jā´-daû, og Jó´-ĕl, Bē-naî´-ăh.
44 Allir hesir høvdu tikið fremmandar ektakonur: og *summir* av teimum høvdu ektakonur, við hvørjum teir høvdu børn.

NEHEMIAH BÓK.

KAPITUL 1

ORÐINI av Nê-hĕ-mī´-ăh Hăch-ă-lī´-ăh syni. Og tað bar á í mánaðinum Chĭs´-lĕv, í tí tjúgunda árinum, sum eg var í Sjū´-sjăn slottinum,
2 At Hă-nā´-nī, ēin av brøðrum mínum, kom, hann og *ávísir* menn úr Judah; og eg spurdi teir viðvíkjandi Jødunum sum høvdu komist undan, sum vóru eftir av fangaskapinum, og viðvíkjandi Jerusalem.
3 Og teir søgdu við meg, Leivdin, sum eru eftir av fangaskapinum har í fylkinum, *eru* í miklari nívd og skemd: múrurin av Jerusalem eisini *er* brotin niður, og tess portur eru brend við eldi.
4 ¶ Og tað bar á, tá ið eg hoyrdi hesi orð, at eg settist niður og græt, og harmaðist *ávísar*

dagar, og fastaði, og bað frammi fyri Guði himins,

5 Og segði, Eg bøni teg, O HARRI Guð himins, hin mikli og øgiligi Guð, sum heldur sáttmála og miskunn hjá teimum ið elska hann og gáa eftir boðum hans:

6 Lat oyra títt nú vera gáið, og eygu tíni opin, at tú mást hoyra bøn tænara tíns, sum eg biði frammi fyri tær nú, dag og nátt, fyri børnum Ísraels, tænarum tínum, og játti syndir Ísraels barna, sum vit hava syndað ímóti tær: bæði eg og faðirs míns hús hava syndað.

7 Vit hava handlað sera spilluligani ímóti tær, og hava ikki hildið boðini, ella ásetingarnar, ella dómarnar, sum tú ábeyðst tænara tínum Mósesi.

8 Minst til, eg bøni teg, orðið, sum tú ábeyðst tænara tínum Mósesi, sigandi, *Um* tit forbróti, vil eg spjaða tykkum útum millum tjóðanna:

9 Men *um* tit vendi at mær, og haldi boðini hjá mær, og geri tey; tó *at* tað vóru av tykkum kastað út at tí ytsta parti himins, *tó* vil eg savna teir haðani frá, og vil føra teir at plássinum sum eg havi valt at seta navn mítt har.

10 Nú, hesir *eru* tænarar tínir og fólk títt, hvørjar tú hevurt endurloyst við mikla mátti tínum, og við sterku hond tíni.

11 O Harri, eg bøni teg, lat nú oyra títt vera gáið fyri bøn tænara tíns, og fyri bøn tænara tína, sum tráa at óttast navn títt: og blóma, eg biði teg, tænara tín henda dag, og veit honum miskunn í eygsjónini á hesum manni. Tí at eg var bikarberi kongsins.

KAPITUL 2

OG tað bar á í mánaðinum Nĭ´-săn, í tí tjúgunda árinum hjá Ăr-tă-xĕrx´-ēs-i kongi, *at* vín *var* frammi fyri honum: og eg tók upp vínið, og gav kongi *tað*. Nú, eg hevði ikki *áðurfyrr* verið dapur í nærveru hans.

2 Hvørsvegna kongur segði við meg, Hví *er* ásjón tín døpur, eftirsum *at* tú *ert* ikki sjúkur? hetta *er* einkið *annað* enn hjarta-harmur. Tá var eg sára ræddur,

3 Og segði við kong, Kongur livi um ævir: hví skuldi ikki mín ásjón verið døpur, tá ið staðurin, plássið av gravhýsum fedra mína, *liggur* oyðin, og hans portur eru upptærd við eldi?

4 Tá segði kongur við meg, Um hvat gert tú fyrispurning? So eg bað til Guðs himins.

5 Og eg segði við kong, Um tað hóvi kongi, og um tín tænari havi funnið yndi í eygsjón tíni, at tú vildirt sent meg at Judah, at staði gravhýsa fedra mína, at eg má byggja hann.

6 Og kongur segði við meg, (drotningin eisini sitandi hjá honum,) Hvussu leingi skal ferð tín vera? og nær vilt tú venda aftur? So tað hóvaði kongi at senda meg; og eg setti honum eina tíð.

7 Harafturat segði eg við kong, Um tað hóvi kongi, lat brøv verða givin mær til landsstjóranna handan ánna, at teir mega flyta meg yvir, til eg komi inn í Judah;

8 Og eitt bræv at Á-săp<u>h</u>-i, passaranum av skógi kongsins, at hann má geva mær timbur at gera bummar til portrini av slottinum sum *hoyrdi* til húsið, og til múr staðarins, og til húsið sum eg skal innfara inn í. Og kongur veitti mær, samsvarandi við hina góðu hond Guðs míns uppiá mær.

9 ¶ Tá kom eg til landsstjóranna handan ánna, og gav teimum brøv kongsins. Nú, kongur hevði sent høvuðsmenn av herinum og hestmenn við mær.

10 Tá ið Săn-băl´-lăt Hór-ŏn-

ĭt′-i, og tænarin Tó′-bĭ-ăh, Ammonitin, hoyrdu *harum,* harmaði tað teir ovurhondsliga, at tað var komin ein maður at søkja vælferð Ísraels barna.

11 So eg kom til Jerusalem, og var har tríggjar dagar.

12 ¶ Og eg reistist um náttina, eg og nakrir fáir menn við mær; hvørki segði eg *nøkrum* manni hvat Guð mín hevði lagt í mítt hjarta at gera í Jerusalem: eiheldur *var nakað* djór við mær, uttan djórið sum eg reið uppiá.

13 Og eg fór út um nátt*ina* við dals-liðið, enntá frammanfyri dreka-lindina, og til mykju-liðið, og skoðaði múrarnar av Jerusalem, sum vóru brotnir niður, og lið tess vóru upptærd við eldi.

14 Tá fór eg áfram til keldu-liðið, og til kongs-hylin: men *har var* einkið pláss hjá djórinum, *sum var* undir mær, at fara yvir.

15 Tá fór eg niðan um náttina við áarløkin, og skoðaði múrin, og vendi aftur, og innfór við dals-liðið, og *so* vendi aftur.

16 Og stjórnararnir vitstu ikki hvagar eg fór, ella hvat eg gjørdi; eiheldur hevði eg, sum enn *var,* sagt *tað* fyri Jødunum, ella fyri prestunum, ella fyri tignarmonnunum, ella fyri stjórnarunum, ella fyri restini sum gjørdu arbeiðið.

17 ¶ Tá segði eg við teir, Tit síggja neyðina sum vit *eru* í, hvussu Jerusalem *liggur* oyðið, og lið tess eru brend við eldi: komið, og latum okkum byggja upp múr Jerusalems, at vit verði ikki longur ein skomm.

18 Tá taldi eg teimum um hond Guðs míns, sum var góð uppiá mær; eins og eisini orðini hjá kongi, sum hann hevði talað við meg. Og teir søgdu, Latum okkum rísa upp og byggja. So teir styrktu hendur sínar til *hetta* góða *verk*.

19 Men tá ið Săn-băl′-lăt Hór-ŏnĭt′-i, og Tó′-bĭ-ăh tænari, Ammonitin, og Gē′-sjēm Arabari, hoyrdu *tað,* læðu teir okkum í háð, og vanvirdu okkum, og søgdu, Hvat *er* hetta tingið sum tit gera? vilja tit gera uppreist ímóti kongi?

20 Tá svaraði eg teimum, og segði við teir, Guð himins, hann vil blóma okkum; tí vilja vit, hansara tænarar, reisast, og byggja: men tit hava ongan skamt, ella rætt, ella minni, í Jerusalem.

KAPITUL 3

TÁ reis upp Ē′-lĭ-ăsj-ĭb høvuðsprestur við brøðrum sínum prestunum, og teir bygdu seyða-liðið; teir halgaðu tað, og settu upp hurðar tess; enntá at torni Mē′-ăh halgaðu teir tað, at torni Hăn′-ă-nēēl-s.

2 Og næstir honum bygdu menninir úr Jericho. Og næst mót teimum bygdi Zăc′-cûr Imrīs sonur.

3 Men fiska-liðið bygdu synirnir hjá Hăs-sē-ná′-ăh, hvørjir *eisini* løgdu bummar tess, og settu upp hurðar tess, stonglar tess, og lokur tess.

4 Og næst teimum umvældi Mĕr′-ē-mōth Ū′-rĭ-jăh sonur Kôz sonar. Og næst teimum umvældi Mē-sjŭl′-lăm Bĕr-ē-chĭ′-ăh sonur Mē-sjēz′-ă-bēēl-s sonar. Og næst teimum umvældi Zā′-dŏk Bā′-ă-nă sonur.

5 Og næstir teimum umvældu Tē-kô-ĭt′-arnir; men teirra tignarmenn løgdu ikki nakkar sínar til arbeiðs Harra síns.

6 Harafturat, gamla-liðið umvældi Jē-hōĭ′-ă-dă Pá′-sē-ăh sonur, og Mē-sjŭl′-lăm Bē-sŏd′-jăh sonur; teir løgdu bummar tess, og settu upp hurðar tess, og stonglar tess, og lokur tess.

7 Og næst teimum umvældi Mē-lăt′-jăh Gibeoniti, og Jā′-dŏn Mē-rō-nō-thĭt′-i, menn Gibeons,

og Mizpah, at hásæti landsstjórans hesumegin ánna.

8 Næst honum umvældi Ūz′zī-ĕl Hâr-hâĭ′-ăh sonur, av gullsmiðunum. Næst honum eisini umvældi Hă-năn′-jăh, sonur at *ēinum av* apotekarunum, og teir vígvirktu Jerusalem at breiða múri.

9 Og næst teimum umvældi Rê-phâĭ′-ăh Hūrs sonur, stjórnarin av hálva partinum av Jerusalem.

10 Og næst teimum umvældi Jĕ-dâĭ′-ăh Hă-rū′-măph-s sonur, enntá yvir av húsi sínum. Og næst honum umvældi Hăt′-tūsj Hăsj-ăb-nĭ′-ăh sonur.

11 Măl-chĭ′-jăh Hár′-ĭm-s sonur, og Hăsj′-ŭb Pá′-hăth-mó′-ăb-s sonur, umvældu hītt stykkið, og bræðsluovna-tornið.

12 Og næst honum umvældi Sjăl′-lŭm Hă-lō′-hĕsj sonur, stjórnarin av hálva partinum av Jerusalem, hann og døtur hansara.

13 Dals-liðið umvældi Há′-nūn, og íbúgvar Zăn-ō′-ăh; teir bygdu tað, og settu upp hurðar tess, stonglar tess, og lokur tess, og eitt túsund alnir á múrinum at mykju-liðinum.

14 Men mykju-liðið umvældi Măl′-chĭ-âh Rē′-chăb-s sonur, stjórnarin av parti av Bĕth-hăc′-cē-rĕm; hann bygdi tað, og setti upp hurðar tess, stonglar tess, og lokur tess.

15 Men lindar-liðið umvældi Sjăl′-lŭm Cŏl-hō′-zĕh sonur, stjórnarin av parti av Mizpah; hann bygdi tað, og dekkaði tað, og setti upp hurðar tess, stonglar tess, og lokur tess, og múrin av hylinum Sĭ′-lō-ăh við urtagarð kongsins, og at trappunum sum fara oman frá staði Dávids.

16 Eftir hann umvældi Nê-hĕ-mĭ′-ăh Āz′-bŭk-s sonur, stjórnarin av hálva partinum av Bĕth′-zūr, at *plássinum* yvir av gravhýsum Dávids, og til hylin sum varð gjørdur, og at húsi hinna mektigu.

17 Eftir hann umvældu Levitarnir, Rē′-hŭm Bá′-nī-s sonur. Næst honum umvældi Hăsj-ă-bī′-ăh, stjórnarin av hálva partinum av Kē-ī′-lăh, í parti sínum.

18 Eftir hann umvældu brøður teirra, Bă′-vâ-ī Hĕn′-ă-dăd-s sonur, stjórnarin av hálva partinum av Kē-ī′-lăh.

19 Og næst mót honum umvældi Ē′-zĕr Jē′-sjû-ă sonur, stjórnarin av Mizpah, eitt annað stykki yvir av niðanfaringini til vápnahúsið við snaringina *av múrinum*.

20 Eftir hann umvældi Bár′-ŭch Zăb′-bâ-ī-s sonur ivrigani hītt stykkið, frá snaringini *av múrinum* at hurðini av húsi Ē′-lī-ăsj-ĭb-s høvuðsprests.

21 Eftir hann umvældi Mĕr′-ĕ-mōth Ū′-rī-jăh sonur Kôz sonar eitt annað stykki, frá hurðini av húsi Ē′-lī-ăsj-ĭb-s enntá til endan av húsi Ē′-lī-ăsj-ĭb-s.

22 Og eftir hann umvældu prestarnir, menn slættarins.

23 Eftir hann umvældu Benjamin og Hăsj′-ŭb yvir av húsi sínum. Eftir hann umvældi Â-zăr′-jăh Mă-ă-sĕj′-ăh sonur Ă-năn′-jăh sonar við hús sítt.

24 Eftir hann umvældi Bĭn′-nû-ī Hĕn′-ă-dăd-s sonur eitt annað stykki, frá húsinum hjá Â-zăr′-jăh at snaringini *av múrinum,* enntá at hjørninum.

25 Pă′-lăl Ū′-zâĭ-s sonur, yvir av snaringini *av múrinum,* og torninum sum liggur út frá tí høga kongshúsinum, sum *var* við forgarðin av fongslinum. Eftir hann Pĕ-dâĭ′-ăh Pá′-rōsj-ar sonur.

26 Harafturat búðu Nĕth-ĭ-nĭm′-arnir í Ō′-phĕl, at *plássinum* yvir av vatn-liðinum ímóti eystan, og torninum sum liggur *fram*úr.

27 Eftir teir umvældu Tē-kô-ĭt′-arnir eitt annað stykki, yvir av torninum mikla sum liggur *fram*úr, alt at Ō′-phĕl-s múrinum.

28 Frá omanfyri hests-liðið umvældu prestarnir, hvør *og* ēin yvir av húsi sínum.
29 Eftir teir umvældi Zā´-dŏk Ĭm´-mĕr-s sonur yvir av húsi sínum. Eftir hann umvældi eisini Sjĕm-āĭ´-ăh Sjĕch-ăn´-jăh sonur, vørðurin av eystur-liðinum.
30 Eftir hann umvældu Hă-năn´-jăh Sjĕl-ĕ-mī´-ăh sonur, og Há´-nūn, sætti sonur Zā´-lăph-s, eitt annað stykki. Eftir hann umvældi Mĕ-sjŭl´-lăm Bĕr-ĕ-chī´-ăh sonur yvir av kamari sínum.
31 Eftir hann umvældi Măl´-chĭ-âh, sonur gullsmiðarins, at plássinum hjá Nĕth-ĭ-nīm´-unum, og hjá handilsmonnunum, yvir av liðinum Mĭph´-kăd, og til niðanfaringina av horninum.
32 Og ímillum niðanfaringina av horninum at seyða-liðinum umvældu gullsmiðirnir og handilsmenninir.

KAPITUL 4

MEN tað bar á, at tá ið Săn-băl´-lăt hoyrdi at vit bygdu múrin, varð hann vreiður, og tók mikla harmavreiði, og háðaði Jødarnar.
2 Og hann talaði frammi fyri brøðrum sínum og herinum hjá Să-mâr´-ĭ-ŭ, og segði, Hvat gera hesir ússaligu Jødarnir? vilja teir vígvirkja seg sjálvar? vilja teir slátur ofra? vilja teir gera lok *á* í einum degi? vilja teir endurlívga steinarnar burtur úr dungunum av ruskinum sum eru brendir?
3 Nú, Tó´-bĭ-ăh Ammoniti *var* hjá honum, og hann segði, Enntá tað sum teir byggja, um ein revur fari upp, hann skal enntá bróta niður teirra steinmúr.
4 Hoyr, O Guð vár; tí at vit eru vanvirdir: og vend teirra spott uppá teirra egna høvur, og gev teir til eina bráð í landinum av fangaskapi:
5 Og dekka ikki teirra misgerð, og lat ikki teirra synd verða slettaða út frammi fyri tær ífrá: tí at teir hava tirrað *teg* til firtnis frammi fyri byggjarunum.
6 So bygdu vit múrin; og allur múrurin varð sameinaður saman at helminginum harav: tí at fólkið hevði ein hug til at arbeiða.
7 ¶ Men tað bar á, *at* tá ið Săn-băl´-lăt, og Tó´-bĭ-ăh, og Arabararnir, og Ammonitarnir, og Ăsjdŏ-dĭt´-arnir hoyrdu, at múrarnir av Jerusalem vóru gjørdir aftur, *og* at skarðini byrjaðu at verða tipt, tá vórðu teir sera vreiðir,
8 Og samansvóru allir av teimum saman at koma *og* at berjast ímóti Jerusalem, og at forða tí.
9 Hóast hetta, vit gjørdu vára bøn at Guði várum, og settu eitt varðhald ímóti teimum dag og nátt, uppá grund av teimum.
10 Og Judah segði, Styrkin hjá berarunum av byrðum er svunnin, og *tað er* nógv rusk; so at vit eru ikki førir fyri at byggja múrin.
11 Og okkara mótstandarar søgdu, Teir skulu ikki vita, eiheldur síggja, til vit koma í miðjuna teirra millum, og vega teir, og elva arbeiðinum at halda uppat.
12 Og tað bar á, at tá ið Jødarnir, sum búðu við teir, komu, søgdu teir við okkum tíggju ferðir, Frá øllum plássum, hvaðan tit skulu venda tilbakar at okkum, *vilja teir vera uppiá tykkum*.
13 ¶ Tí setti eg í teimum lægru plássunum aftanfyri múrin, *og* á teimum hægru plássunum, eg enntá setti fólkið eftir familjum sínum við svørðum sínum, spjótum sínum, og bogum sínum.
14 Og eg hugdi, og reis upp, og segði við tignarmenninar, og til stjórnararnar, og til restina av fólkinum, Verið ikki tit ræddir fyri teimum: minnist til Harran, *sum er* mikil og øgiligur, og berjist fyri brøður tykkara, synir tykkara,

og døtur tykkara, konur tykkara, og hús˘ tykkara.

15 Og tað bar á, tá ið okkara fíggindar hoyrdu at tað var kunnugt okkum, og Guð hevði fört teirra ráð til einkiðs, at vit vendu aftur allir av okkum til múrin, hvør *og* ēin at arbeiði sínum.

16 Og tað bar á frá teirri tíð fram, *at* helvtin av tænarum mínum arbeiddu í arbeiðinum, og hīn helvtin av teimum hildu bæði spjótunum, skjøldrunum, og bogunum, og bróstbrynjunum; og stjórnararnir *vóru* aftanfyri alt hús Judah.

17 Teir sum bygdu á múrinum, og teir sum bóru byrðar, við teimum sum laðaðu; *hvør og ēin* við ēinari av hondum sínum arbeiddi í arbeiðinum, og við hīnari *hondini* helt einum vápni.

18 Tí at byggjararnir, hvør *og* ēin hevði svørð sítt gyrt við lið sína, og *soleiðis* bygdu. Og hann, sum ljóðaði lúðurin, *var* hjá mær.

19 ¶ Og eg segði við tignarmenninar, og til stjórnararnar, og til restina av fólkinum, Arbeiðið *er* mikið og stórt, og vit eru atskildir uppiá múrinum, ēin langt frá øðrum.

20 Á tí plássi *tessvegna, íð* tit hoyra ljóðið av lúðrinum, leitið tit hagar at okkum: Guð okkara skal berjast fyri okkum.

21 So vit strevaðust í verkinum: og helvt*in* av teimum hildu spjótunum frá rísing morgunsins til stjørnurnar komu til sjóndar.

22 Somuleiðis á hini somu tíð segði eg við fólkið, Lat hvønn *og* ēin við tænarum sínum halda til innanfyri Jerusalem, at um náttina teir mega vera ein verja hjá okkum, og arbeiða um dagin.

23 So hvørki eg, ella bróður mínir, ella tænarar mínir, ella menninir av verjuni sum fylgdu mær, eingin av okkum fóru úr klæðum okkara, *uttan at* hvør *og* ēin fór úr teimum til tváingar.

KAPITUL 5

OG har varð eitt mikið róp av fólkinum og av konum teirra ímóti bróðrum teirra, Jødunum.

2 Tí at har vóru sum søgdu, Vit, synir okkara, og døtur okkara, *eru* mong: tí taka vit upp korn *til teirra,* at vit mega eta, og liva.

3 *Summir* eisini tað vóru sum søgdu, Vit hava veðsett okkara jarðir, víngarðar, og hús˘, at vit máttu keypa korn, uppá grund av hallárinum.

4 Tað vóru eisini sum søgdu, Vit hava lænt pening til íkast kongs, *og tað uppá* okkara jarðir og víngarðar.

5 Tó nú *er* hold okkara sum hold bróðra okkara, børn okkara sum børn teirra: og sí, vit føra inn í trældóm synir okkara og døtur okkara til at vera tænarar, og *summar* av døtrum okkara eru førdar inn í trældóm *longu:* eiheldur *er tað* í okkara mátti *at endurloysa tey;* tí at aðrir menn hava okkara jarðir og víngarðar.

6 ¶ Og eg var sera firtin, tá ið eg hoyrdi teirra róp og hesi orð.

7 Tá ráðførdist eg við sjálvan meg, og eg hartaði tignarmenninar, og stjórnararnar, og segði við teir, Tit krevja fæleigu, hvør *og* ēin av bróður sínum. Og eg setti ein miklan savnað ímóti teimum.

8 Og eg segði við teir, Vit, eftir førleika okkara, hava endurloyst okkara bróður — Jødarnar, sum vóru seldir teimum heidnu; og vilja tit enntá selja bróður tykkara? ella skulu teir verða seldir okkum? Tá hildu teir friði sínum, og funnu einkið *at svara.*

9 Eisini segði eg, Tað *er* ikki gott, tað tit gera: áttu tit ikki at gingið í ótta Guðs várs uppá grund av spotti hinna heidnu, okkara fíggindum?

10 Eg líkaleiðis, *og* bróður

mínir, og tænarar mínir, kundi kravt av teimum pening og korn: eg biði tykkum, latum okkum lætta av hesi fæleigu.

11 Endurbøtið, eg biði tykkum, til teirra, enntá henda dag, jarðir teirra, víngarðar teirra, og olivingarðar teirra, og hús˙ teirra, eisini hundradasta *partin* av peninginum, og av korninum, víninum, og oljuni, sum tit krevja av teimum.

12 Tá søgdu teir, Vit vilja endurbøta *tey*, og vilja einkið krevja av teimum; soleiðis vilja vit gera sum tú sigurt. Tá kallaði eg prestarnar, og tók ein eið av teimum, at teir skuldu gera samsvarandi við hetta lyfti.

13 Eisini risti eg fald mín, og segði, Guð soleiðis risti út hvønn mann frá húsi hans, og frá arbeiði hans, sum fremur ikki hetta lyfti, enntá svá verði hann ristur út, og tømdur. Og øll samkoman segði, Á-měn, og prísaði HARRANUM. Og fólkið gjørdi samsvarandi við hetta lyfti.

14 ¶ Harafturat frá tí tíðini sum eg varð útnevndur at vera landsstjóri teirra í landi Judah, frá tí tjúgunda árinum alt at tí tvey og tríatiunda árinum hjá Ărtă-xĕrx´-ēs-i kongi, *tað er* tólv ár, hava eg og brøður mínir ikki etið breyð landsstjórans.

15 Men hinir fyrru landsstjórarnir, sum *høvdu verið* undan mær, vóru kravsamir fólkinum, og høvdu tikið av teimum breyð og vín, umframt fjøruti sjē´-kl-ar av silvuri; ja, sjálvt tænarar teirra bóru stjórn yvir fólkinum: men soleiðis gjørdi ikki eg, vegna ótta Guðs.

16 Ja, eg eisini helt áfram í arbeiðinum av hesum múrinum, eiheldur keyptu vit nakra jørð: og allir tænarar mínir *vóru* savnaðir hagar at arbeiðinum.

17 Harafturat *vóru tað* við borð mítt eitt hundrað og fimti av Jødunum og stjórnarunum, umframt teir sum komu at okkum hinna heidnu millum ífrá, sum *eru* um okkum.

18 Nú, *tað* sum varð tilreitt *til mín* dagliga, *var* ēin oksi *og* seks úrvals seyðir; eisini fuglar vórðu tilreiddir til mín, og ēinaferð í tíggju døgum goymsla av alskyns víni: tó fyri alt hetta kravdi ikki eg breyð landsstjórans, av tí at trældómurin var tungur uppiá hesum fólkinum.

19 Tonk uppá meg, Guð mín, til gott, *samsvarandi* við alt sum eg havi gjørt fyri hetta fólk.

KAPITUL 6

NÚ, tað bar á, tá ið Săn-băl´-lăt, og Tó´-bī-ăh, og Gē´-sjĕm Arabari, og restin av figgindum okkara, hoyrdu at eg hevði bygt múrin, og *at* tað var einkið skarð eftir harí; (hóast á teirri tíð hevði eg ikki sett upp hurðarnar uppá liðini;)

2 At Săn-băl´-lăt og Gē´-sjĕm sendu at mær, sigandi, Kom, latum okkum møtast saman í *einihvørjari av* bygdunum á Ō´-nō slætta. Men teir hugsaðu at gera mær ilt.

3 Og eg sendi sendiboðar at teimum, sigandi, Eg geri eitt mikið arbeiði, so at eg kann ikki koma oman: hví skuldi arbeiðið steðgað, meðan eg fari frá tí, og komi oman til tykkara?

4 Tó sendu teir at mær fýra ferðir eftir hesum slagi; og eg svaraði teimum eftir hinum sama háttarlagi.

5 Tá sendi Săn-băl´-lăt tænara sín at mær á líkan hátt hina fimtu ferð, við einum opnum brævi í hond síni;

6 Hvarí *stóð* skrivað, Tað er fráboðað millum hinna heidnu, og Găsj´-mû sigur *tað, at* tú og Jødarnir hugsa at *gera* uppreist:

fyri hvørja grund tú byggirt múrin, at tú mást vera kongur teirra, samsvarandi við hesi orð.

7 Og tú hevurt eisini útnevnt prophetar at prædika um teg í Jerusalem, sigandi, Ein kongur *er* í Judah: og nú skal tað verða fráboðað fyri kongi samsvarandi við hesi orð. Kom nú tessvegna, og latum okkum halda ráð saman.

8 Tá sendi eg at honum, sigandi, Tað eru eingir slíkir lutir gjørdir sum tú sigurt, men tú uppspinnurt teir út úr egna hjarta tínum.

9 Tí at teir allir gjørdu okkum ræddar, sigandi, Teirra hendur skulu verða veiklaðar frá arbeiðinum, at tað ei verði gjørt. Nú tessvegna, *O Guð,* styrk hendur mínar.

10 Síðan kom eg at húsi Sjĕmâĭ´-ăh Dĕl-âĭ´-ăh sonar Mĕ-hĕt´-ă-bēēl-s sonar, sum *var* lokaður inni; og hann segði, Latum okkum møtast saman í húsi Guðs, innanfyri templið, og latum okkum loka hurðarnar av templinum: tí at teir vilja koma at vega teg; ja, um náttina vilja teir koma at vega teg.

11 Og eg segði, Skuldi slíkur maður sum eg flýggjað? og hvør *er tað,* sum, *verandi* sum eg *eri,* vildi farið inn í templið at frelsa lív sítt? eg vil ei fara inn.

12 Og sí, eg varnaðist at Guð hevði ikki sent hann; men at hann lýsti hetta prophetīið ímóti mær: tí at Tó´-bĭ-ăh og Săn-băl´-lăt høvdu leigað hann.

13 Tessvegna *varð* hann leigaður, at eg skuldi verðið ræddur, og gjørt soleiðis, og syndað, og *at* teir máttu havt *evni* til eitt ilt ummæli, at teir máttu lastað meg.

14 Guð mín, tonk tú uppá Tó´-bĭ-ăh og Săn-băl´-lăt samsvarandi við hesi verk teirra, og um prophetinnuna Nó-ăd-jŭh, og restina av prophetunum, sum vildu havt sett meg í ótta.

15 ¶ So múrurin varð fullførdur á tí tjúgu og fimta *deginum* av *mánaðinum* Ē´-lŭl, á fimti og tveimum døgum.

16 Og tað bar á, at tá ið allir okkara fíggindar hoyrdu *harum,* og allir hinir heidnu sum *vóru* kring okkum sóu *hesar lutir,* vórðu teir mikið slignir niður í egnu eygum sínum: tí at teir varnaðust, at hetta verk var virkað av Guði várum.

17 ¶ Harafturat í teimum døgum sendu tignarmenninir av Judah mong brøv til Tó´-bĭ-ăh, og *brøvini* hjá Tó´-bĭ-ăh komu at teimum.

18 Tí at *tað vóru* mangir í Judah svornir at honum, av tí at hann *var* versonur Sjĕch-ăn´-jăh Âr´-ăh sonar; og sonur hansara, Jó´-hâ-năn, hevði tikið dóttur Mĕsjŭl´-lăm-s Bĕr-ĕ-chĭ´-ăh sonar.

19 Teir eisini boðaðu frá hansara góðu gerðum frammi fyri mær, og mæltu orð míni fyri honum. *Og* Tó´-bĭ-ăh sendi brøv til at seta meg í ótta.

KAPITUL 7

NÚ, tað bar á, tá ið múrurin var bygdur, og eg hevði sett upp hurðarnar, og duravørðirnir og sangararnir og Levitarnir vóru útnevndir,

2 At eg gav bróður mínum Hănā´-nī, og Hă-năn´-jăh — stjórnara slottsins, álegging yvir Jerusalem: tí at hann *var* ein trúfastur maður, og óttaðist Guð omanfyri mangar.

3 Og eg segði við teir, Latið ikki portrini av Jerusalem verða opnað inntil sólin verði heit; og meðan teir standa hjá, lat teir lata aftur hurðarnar, og *seta* loku *fyri tær:* og útnevna vaktir av íbúgvunum av Jerusalem, hvønn *og* ēin í vakt sína, og hvønn *og* ēin *at vera* yvir av húsi sínum.

4 Nú, staðurin *var* stórur og mikil: men fólkið *var* fátt harí, og húsini *vóru* ikki bygd.

5 ¶ Og Guð mín legði inn í mítt hjarta at savna saman tignarmenninar, og stjórnararnar, og fólkið, at teir máttu verða roknaðir eftir ættartali. Og eg fann eina skrá av ættartalinum hjá teimum sum komu upp í fyrstani, og fann skrivað harí,

6 Hesir *eru* børn fylkisins, sum fóru upp út úr fangaskapinum, av teimum sum høvdu verðið bornir burtur, hvørjar Nĕ-bŭchăd-nēz´-zâr, kongur Bábylons, hevði borið burtur, og komu aftur til Jerusalem og til Judah, hvør *og* ēin at staði sínum;

7 Hvørjir komu við Zĕ-rūbbá´-bĕl-i, Jē´-sjû-ă, Nê-hĕ-mī´-ăh, Â-zăr´-jăh, Rā-ă-mī´-ăh, Ná-hă-mā´-nī, Mōr´-dĕ-cāi, Bilsjan, Mīs´-pē-rĕth, Bĭg´-vâ-ī, Nē´-hŭm, Bā´-ă-năh. Talið, *sigi eg,* á monnunum av fólki Ísraels *var hetta;*

8 Børn Pá´-rōsj-ar, tvey túsund eitt hundrað *og* sjeyti og tveir.

9 Børn Sjĕph-ăt´-jăh, trý hundrað *og* sjeyti og tveir.

10 Børn Âr´-ăh, seks hundrað *og* fimti og tveir.

11 Børn Pá´-hăth-mó´-ăb-s, av børnum Jē´-sjû-ă og Jó´-ăb-s, tvey túsund og átta hundrað *og* átjan.

12 Børn Ē´-lăm-s, eitt túsund tvey hundrað *og* fimti og fýra.

13 Børn Zăt´-tû-s, átta hundrað *og* fýrati og fimm.

14 Børn Zăc´-câ-ī-s, sjey hundrað og trísinstjúgu.

15 Børn Bĭn´-nû-ī-s, seks hundrað *og* fýrati og átta.

16 Børn Bē´-bā-ī-s, seks hundrað *og* tjúgu og átta.

17 Børn Azgads, tvey túsund trý hundrað *og* tjúgu og tveir.

18 Børn Ă-dó´-nī-kăm-s, seks hundrað *og* trísinstjúgu og sjey.

19 Børn Bĭg´-vâ-ī-s, tvey túsund trísinstjúgu og sjey.

20 Børn Á´-dĭn-s, seks hundrað *og* fimti og fimm.

21 Børn Ā´-tĕr-s hjá Hĕz-ē-kī´-ăh, níti og átta.

22 Børn Há´-sjŭm-s, trý hundrað *og* tjúgu og átta.

23 Børn Bē´-zâ-ī-s, trý hundrað *og* tjúgu og fýra.

24 Børn Hâr´-īph-s, eitt hundrað og tólv.

25 Børn Gibeons, níti og fimm.

26 Menninir úr Beth-lehem og Nê-tō´-phăh, eitt hundrað *og* fýrsinstjúgu og átta.

27 Menn Án´-ă-thōth-s, eitt hundrað *og* tjúgu og átta.

28 Menn Bĕth-ăz-má´-vĕth-s, fjøruti og tveir.

29 Menn Kĭr´-jăth-jē´-ă-rĭm-s, Chĕ-phī´-răh, og Bē ēr´-ōth-s, sjey hundrað *og* fýrati og tríggir.

30 Menn Rá´-măh og Gē´-bă, seks hundrað *og* tjúgu og ēin.

31 Menn Mích´-măs-ar, eitt hundrað og tjúgu og tveir.

32 Menn Beth-el-s, og Á´-ī-s, eitt hundrað og tjúgu og tríggir.

33 Menn hīns Nē´-bō-s, fimti og tveir.

34 Børn hīns Ē´-lăm-s, eitt túsund tvey hundrað *og* fimti og fýra.

35 Børn Hár´-ĭm-s, trý hundrað og tjúgu.

36 Børn Jerichos, trý hundrað *og* fýrati og fimm.

37 Børn Lōds, Há´-dĭd-s, og Ō´-nō-s, sjey hundrað *og* tjúgu og ēin.

38 Børn Sĕ-ná´-ăh, trý túsund níggju hundrað og tríati.

39 ¶ Prestarnir: børn Jĕ-dâí´-ăh, av húsi Jē´-sjû-ă, níggju hundrað *og* sjeyti og tríggir.

40 Børn Ĭm´-mĕr-s, eitt túsund fimti og tveir.

41 Børn Păsj´-ûr-s, eitt túsund tvey hundrað *og* fýrati og sjey.

42 Børn Hár´-ĭm-s, eitt túsund og seytjan.

43 ¶ Levitarnir: børn Jē´-sjû-ă, Kăd´-mī-ĕl-s, *og* av børnum Hō´-dĕ-vâh, sjeyti og fýra.

44 ¶ Sangararnir: børn Á-săph-s, eitt hundrað *og* fýrati og átta.
45 ¶ Duravørðirnir: børn Sjăl-lŭm-s, børn Ā-tĕr-s, børn Tăl-mŏn-s, børn Ăk-kŭb-s, børn Há-tĭ-tă, børn Sjō-bâ-ī-s, eitt hundrað *og* tríati og átta.
46 ¶ Nĕth-ĭ-nĭm-arnir: børn Zĭ-hă, børn Hâ-sjŭ-phă, børn Tăb-bâ-ōth-s,
47 Børn Kē-rŏs-ar, børn Sī-ă, børn Pá-dŏn-s,
48 Børn Lĕ-bā-nă, børn Hăg-ă-bă, børn Sjăl-mâĭ-s,
49 Børn Há-năn-s, børn Gĭd-dĕl-s, børn Gá-hâr-s,
50 Børn Rê-aĭ-ăh, børn Rē-zĭn-s, børn Nê-kō-dă,
51 Børn Găz-zăm-s, børn Ŭz-ză, børn Phá-sĕ-ăh,
52 Børn Bē-saĭ-s, børn Mē-ûnĭm-s, børn Nĕ-phĭsj-ē-sĭm-s,
53 Børn Băk-bŭk-s, børn Hă-kŭ-phă, børn Hâr-hûr-s,
54 Børn Băz-lĭth-s, børn Mĕ-hĭ-dă, børn Hâr-sjă,
55 Børn Bâr-kŏs-ar, børn Sĭ-sĕ-ră, børn Tá-măh,
56 Børn Nē-zĭ-ăh, børn Há-tĭ-phă.
57 ¶ Børnini hjá tænarum Sálomons: børn Sŏ-tâ-ĭ-s, børn Sŏ-phĕ-rĕth-s, børn Pē-rĭ-dă,
58 Børn Já-ă-lă, børn Dâr-kŏn-s, børn Gĭd-dĕl-s,
59 Børn Sjĕph-ăt-jăh, børn Hăt-tĭl-s, børn Pô-chē-rĕth-s úr Zē-bă-ĭm, børn Ámons.
60 Allir Nĕth-ĭ-nĭm-arnir, og børnini hjá tænarum Sálomons, *vóru* trý hundrað *og* níti og tveir.
61 Og hesir *vóru* teir sum fóru upp *eisini* frá Tĕl-mĕ-lăh, Tĕl-hă-rē-sjă, Cherub, Ăd-dŏn, og Ĭm-mĕr: men teir kundu ikki sýna hús faðirs síns, ella sáð sítt, hvørt teir *vóru* av Ísrael.
62 Børn Dĕl-aĭ-ăh, børn Tó-bĭ-ăh, børn Nê-kō-dă, seks hundrað *og* fýrati og tveir.
63 ¶ Og av prestunum: børn Hă-bâĭ-ăh, børn Kôz, børn Bâr-zĭl-lā-ĭ-s, sum tók *ēina* av døtrum Bâr-zĭl-lā-ĭ-s Gileadita til konu, og varð kallaður eftir navni teirra.
64 Hesir søktu skrá sína *millum* teirra sum vórðu roknaðir eftir ættartali, men hon varð ikki funnin: tí vórðu teir, sum óreinkaðir, settir frá prestadøminum.
65 Og Tĭr-sjá-thă-in segði við teir, at teir skuldu ikki eta av teimum mest heilagu tingunum, til tað stóð *upp* ein prestur við Ū-rĭm og Thûm-mĭm.
66 ¶ Øll samkoman tilsamans *var* fjøruti og tvey túsund trý hundrað og trísinstjúgu,
67 Umframt teirra tænastusveinar og teirra tænastumoyggjar, av hvørjum *tað vóru* sjey túsund trý hundrað *og* tríati og sjey: og teir høvdu tvey hundrað *og* fýrati og fimm syngjandi menn og syngjandi kvinnur.
68 Teirra hestar sjey hundrað *og* tríati og seks: teirra múldjór tvey hundrað *og* fýrati og fimm:
69 *Teirra* kamelar fýra hundrað *og* tríati og fimm: seks túsund sjey hundrað og tjúgu asnar.
70 ¶ Og summir av teimum fremstu av fedrunum góvu innat arbeiðinum. Tĭr-sjá-thă-in gav til dýrgripagoymsluna eitt túsund dárikar av gulli, fimti kør, fimm hundrað og tríati prestabúnar.
71 Og *summir* av teimum fremstu av fedrunum góvu til dýrgripagoymsluna av arbeiðinum tjúgu túsund dárikar av gulli, og tvey túsund og tvey hundrað pund av silvuri.
72 Og *tað*, sum restin av fólkinum gav, *var* tjúgu túsund dárikar av gulli, og tvey túsund pund av silvuri, og trísinstjúgu og sjey prestabúnar.
73 So prestarnir, og Levitarnir, og duravørðirnir, og sangararnir, og *summir* av fólkinum, og Nĕth-

ĭ-nĭm′-arnir, og allur Ísrael, búðu í staðum sínum; og tá ið tann sjeyndi mánaðurin kom, *vóru* børn Ísraels í staðum sínum.

KAPITUL 8

OG alt fólkið savnaðu seg sjálvar saman sum ēin maður á strætið sum *var* frammanfyri vatn-liðið; og teir talaðu við Ezra hin skriftlærda *um* at koma við bók lógar Mósesar, sum HARRIN hevði áboðið til Ísraels.

2 Og Ezra prestur kom við lógini framfyri samkomuna bæði av monnum og kvinnum, og øllum sum dugdu *at* hoyra við skili, uppá hin fyrsta dagin av tí sjeynda mánaðinum.

3 Og hann las harí frammanfyri strætið sum *var* frammanfyri vatn-liðið, frá morgninum inntil middag, frammi fyri monnunum og kvinnunum, og teimum sum dugdu *at* skilja; og oyruni hjá øllum fólkinum *vóru gáin* yvirfyri bók lógarinnar.

4 Og Ezra hin skriftlærdi stóð uppiá einum prædikustóli av træi, sum teir høvdu gjørt til endamálið; og við síðuna av honum stóð Măt-tĭ-thī′-ăh, og Sjē′-mă, og Ă-năĭ′-ăh, og Ū′-rī-jăh, og Hĭl′-kī-ăh, og Mā-ă-sēj′-ăh, til høgru handar hansara; og til hansara vinstru handar Pē-dāĭ′-ăh, og Mĭ′-sjâ-ĕl, og Măl′-chī-âh, og Há′-sjŭm, og Hăsj-bă-dā′-nă, Zĕch-ăr′-jăh, *og* Mē-sjŭl′-lăm.

5 Og Ezra opnaði bókina í eygsjónini á øllum fólkinum; (tí at hann var uppiyvir øllum fólkinum;) og tá ið hann opnaði hana, stóð alt fólkið upp:

6 Og Ezra vælsignaði HARRAN, hin mikla Guð. Og alt fólkið svaraði Á′-mĕn, Á′-mĕn, við *at* lyfta upp hondum sínum: og tey boygdu høvdum sínum, og tilbóðu HARRAN við andlitum *sínum* til jarðarinnar.

7 Eisini Jē′-sjû-ă, og Bá′-nī, og Sjĕr-ē-bī′-âh, Já′-mīn, Ăk′-kŭb, Sjăb′-bē-thaî, Hó-dī′-jăh, Mā-ă-sēj′-ăh, Kê-lī′-tă, Â-zăr′-jăh, Jó′-ză-băd, Há′-năn, Pē-lâĭ′-ăh, og Levitarnir, voldu fólkinum at skilja lógina: og fólkið *stóð* í plássi sínum.

8 So teir lósu í bókini í lóg Guðs greiniliga, og góvu merkingina, og voldu *teimum* at skilja lesnaðin.

9 ¶ Og Nê-hĕ-mī′-ăh, sum *er* Tĭr-sjá′-thă-in, og Ezra prestur hin skriftlærdi, og Levitarnir sum lærdu fólkið, søgdu við alt fólkið, Hesin dagurin *er* heilagur at HARRANUM Guði tykkara; harmist ikki, ella grátið. Tí at alt fólkið græt, tá ið tey hoyrdu orð˘ lógarinnar.

10 Tá segði hann við tey, Farið veg tykkara, etið tað feita, og drekkið tað søta, og sendið skamtir at teimum, til hvørja einkið er tilreitt: tí at *hesin* dagurin *er* heilagur at Harra várum: eiheldur veri tit syrgnir; tí at gleði HARRANS er styrki tykkara.

11 So Levitarnir sissaðu alt fólkið, sigandi, Haldið friði tykkara, tí at dagurin *er* heilagur; eiheldur veri tit harmir.

12 Og alt fólkið fór sín veg at eta, og at drekka, og at senda skamtir, og at inna mikið kæti, av tí at tey høvdu skilt orðini sum vórðu kunngjørd teimum.

13 ¶ Og á øðrum deginum vóru savnaðir saman teir fremstu av fedrunum hjá øllum fólkinum, prestarnir, og Levitarnir, at Ezra tí skriftlærda, enntá *fyri* at skilja orð˘ lógarinnar.

14 Og teir funnu skrivað í lógini, sum HARRIN hevði áboðið við Mósesi, at børn Ísraels skuldu búgva í búðum í hátíðini av tí sjeynda mánaðinum:

15 Og at teir skuldu kunngera og lýsa í øllum staðum sínum, og í Jerusalem, sigandi, Farið út at

fjallinum, og heintið olivingreinar, og furugreinar, og myrtugreinar, og pálmagreinar, og greinar av tjúkkum trøum, til at gera búðir, eins og skrivað *stendur*.

16 ¶ So fólkið fór fram, og førdi *tær*, og gjørdi sær búðir, hvør *og* ēin uppiá takinum av húsi sínum, og í forgørðum sínum, og í forgørðum húsar Guðs, og í gøtu vatn-liðsins, og í gøtu Ē´-phră-īm-s-liðsins.

17 Og øll samkoman av teimum, sum vóru komnir aftur úr fangaskapinum, gjørdu búðir, og sótu undir búðunum: tí at síðan dagar Jē´-sjû-ă Nuns sonar at tí deginum høvdu ikki børn Ísraels gjørt so. Og har var sera mikil gleði.

18 Eisini dag um dag, frá tí fyrsta deginum at tí síðsta deginum, las hann í bók lógar Guðs. Og teir hildu hátíðina sjey dagar; og á tí áttanda deginum *var* ein hátíðar-samkoma, sambært háttarlaginum.

KAPITUL 9

NÚ, á tí tjúgunda og fjórða deginum av hesum mánaðinum vórðu børn Ísraels savnaðir við føstu, og við sekkjaklæðum, og jørð uppiá sær.

2 Og sáð Ísraels atskildu seg sjálvar frá øllum fremmandum, og stóðu og játtaðu syndir sínar, og misgerðir fedra sína.

3 Og teir stóðu upp í plássi sínum, og lósu í bók lógar HARRANS Guðs síns *ēin* fjórðapart av deginum; og *ein annan* fjórðapart játtaðu teir, og tilbóðu HARRAN Guð sín.

4 ¶ Tá stóðu upp uppá trappurnar, av Levitunum, Jē´-sjû-ă, og Bá´-nī, Kăd´-mī-ĕl, Sjĕb-ă-nī´-ăh, Bŭn´-nī, Sjĕr-ĕ-bī´-âh, Bá´-nī, *og* Chĕ-ná´-nī, og róptu við harðari rødd á HARRAN Guð sín.

5 Tá søgdu Levitarnir, Jē´-sjû-ă, og Kăd´-mī-ĕl, Bá´-nī, Hăsj-ăb-nī´-ăh, Sjĕr-ĕ-bī´-âh, Hó-dī´-jăh, Sjĕb-ă-nī´-ăh, *og* Pĕth-ă-hī´-ăh, Standið upp *og* vælsignið HARRAN Guð tykkara um ævir og ævir: og vælsignað veri títt dýrdsama navn, sum er upphevjað uppum alla signing og prís.

6 Tú, *enntá* tú, *ert* HARRI aleinaur; tú hevurt gjørt himin, himinin av himnum, við øllum herliði teirra, jørðina, og øll *ting* sum *eru* harí, sjógvarnar, og alt sum *er* harí, og tú varðveitirt tey øll; og herlið himins tilbiður teg.

7 Tú *ert* HARRIN Guð, hvør valdirt Ábram, og førdirt hann fram út úr Ūr hjá Chăl-dē´-unum, og gavst honum Ábrahams navnið;

8 Og fanst hansara hjarta trúfast frammi fyri tær, og gjørdirt ein sáttmála við hann *um* at geva land Cānaanitanna, Hittitanna, Amoritanna, og Pē-rīz-zīt´-anna, og Jĕb-ŭ-sīt´-anna, og Gĭr-gă-sjīt´-anna, at geva *tað*, *sigi eg*, til sáðs hansara, og hevurt útint tíni orð; tí at tú *ert* rættvísur:

9 Og sást nívdina hjá okkara fedrum í Egyptalandi, og hoyrdirt róp teirra við Reyða-havið;

10 Og sýndirt tekin og undur uppá Pharaoh, og á allar tænarar hansara, og á alt fólk lands hansara: tí at tú vitstirt, at teir handlaðu stoltsligani ímóti teimum. Soleiðis fekst tú tær eitt navn, eins og *tað er* henda dag.

11 Og tú skildirt sjógvin frammi fyri teimum, so at teir fóru ígjøgnum miðjuna av sjónum á tí turra landinum; og teirra atsøkjarar tú kastaðirt inn í dýpini, sum ein stein í hini mektigu vøtn.

12 Harafturat leiddirt tú teir á deginum við eini skýggjutari súlu; og á náttini við eini súlu av eldi, at geva teim ljós á

veginum, í hvørjum teir skuldu fara.

13 Tú komst niður eisini uppá Sĭ-naî fjall, og talaðirt við teir frá himni, og gavst teimum rættar dómar, og sannar lógir, góðar á-setingar og boðˇ:

14 Og gjørdirt teim kunnan tín heilaga sabbat, og ábeyðst teim forskriftir, ásetingar, og lógir, viðˆ hendi Móse, tænara tíns:

15 Og gavst teimum breyð frá himni fyri teirra hungur, og førdirt fram vatn til teir út úr klettinum fyri teirra torsta, og fyrijáttaðirt teimum, at teir skuldu fara inn at *taka* til ognar landið, sum tú hevðirt svorið at geva teimum.

16 Men teir og okkara fedrar handlaðu stoltsliga, og herdu sínar svírar, og lurtaðu ikki eftir boðum tínum,

17 Og sýttu at akta, eiheldur vóru minnugir um tíni undur, sum tú gjørdirt teirra millum; men herdu sínar svírar, og í sínum uppreisti útnevndu ein høvuðsmann til at venda aftur til trældóm sín: men tú *ert* ein Guð — klárur at náða, náðisamur og miskunnarfullur, seinur til firtnis, og av miklari blídni, og yvirgavst teir ikki.

18 Ja, tá ið teir høvdu gjørt sær ein bræddan kálv, og sagt, Hesin *er* Guð tín, sum førdi teg upp úr Egyptalandi, og høvdu virkað miklar tirringar;

19 Tú tó í tínum margfaldu miskunnum yvirgavst teir ikki í oyðuni: stólpin av skýgginum veik ikki frá teimum um dag*in*, at leiða teir í veginum; eiheldur stólpin av eldi um nátt*ina*, at sýna teim ljós, og vegin — í hvørjum teir skuldu fara.

20 Tú gavst eisini tín góða anda at leiðbeina teimum, og afturheltst ikki títt măn-nă frá teirra munni, og gavst teimum vatn fyri teirra torsta.

21 Ja, fjøruti ár tú uppiheltst teimum í oyðuni, *so at* teim vantaði einkið; teirra klæðir vuksu ei gomul, og teirra føtur trútnaðu ei.

22 Harafturat gavst tú teim kongadømir og tjóðir, og deildirt teir í hjørnˇ: so at teir ognaðust landið hjá Sĭ-hŏn, og landið hjá kongi Hĕsj-bŏn-s, og landið hjá Og kongi av Bá-sjăn.

23 Teirra børn eisini tú margfaldaðirt sum stjørnur himins, og førdirt teir inn í landið, viðvíkjandi hvørjum tú hevðirt fyrijáttað fyri teirra fedrum, at teir skuldu fara inn at ognast *tað*.

24 So børnini fóru inn og ognaðust landið, og tú undirlegðirt frammi fyri teimum íbúgvar landsins, Cănaanitarnar, og gavst teir inn í teirra hendur, við kongum teirra, og fólki landsins, at teir máttu gera við teir sum teir vildu.

25 Og teir tóku sterkar staðir, og eitt feitt land, og ognaðust hús full av øllum góðsi, brunnar grivnar, víngarðar, og olivingarðar, og frukttrø í ríkiligleika: so teir ótu, og vórðu fyltir, og gjørdust feitir, og fragdaðu sær í tíni miklu góðsku.

26 Hóast hetta, teir vórðu ólýdnir, og gjørdu uppreist ímóti tær, og kastaðu tína lóg afturum sínar ryggir, og vógu tínar prophetar, sum vitnaðu ímóti teimum til at venda teimum til tín, og teir virkaðu miklar tirringar.

27 Tú tessvegna flýggjaðirt teir inn í hondina á teirra figgindum, sum nívdu teir: og í tíðini av teirra trongd, tá ið teir róptu at tær, tú hoyrdirt *teir* frá himni; og samsvarandi við tínar margfaldu miskunnir tú gavst teimum frelsarar, sum frelstu teir út úr hondini á teirra figgindum.

28 Men eftir *at* teir høvdu hvílu, gjørdu teir ilt aftur frammi fyri tær: tí eftirlætst tú teir í

hondini á teirra figgindum, so at teir høvdu harradømið yvir teimum: tó, tá ið teir vendu aftur, og róptu at tær, tú hoyrdirt *teir* frá himni; og mangar ferðir tú útfríaðirt teir samsvarandi við tínar miskunnir;

29 Og vitnaðirt ímóti teimum, at tú máttirt føra teir aftur at tíni lóg: teir tó handlaðu hugmóðiga, og lýddu ikki á tíni boð, men syndaðu ímót tínum dómum, (sum, um ein maður geri, hann skal liva í teim;) og drógu undan økslina, og herdu sín svíra, og vildu ikki hoyra.

30 Tó mong ár tú bart yvir við teim, og vitnaðirt ímót teimum við^ anda tínum í prophetum tínum: tó vildu teir ikki læna oyra: tí gavst tú teir inn í hondina á fólki landanna.

31 Hóast hetta, fyri tína miklu miskunna sakir tú upptærdirt teir ikki fullkomiliga, ella yvirgavst teir; tí at tú *ert* ein náðisamur og miskunnarfullur Guð.

32 Nú tessvegna, Guð vár, hin mikli, hin mektigi, og hin øgiligi Guð, hvør heldurt sáttmála og miskunn, lat ikki alla trongdina tykjast lítla frammi fyri tær, sum hevur komið uppá okkum, á várar kongar, á várar prinsar, og á várar prestar, og á várar prophetar, og á várar fedrar, og á alt fólk títt, síðan tíðina hjá kongunum av Assýriu at hesum degi.

33 Hvussu enn er, tú *ert* rættvísur í øllum sum er ført omanyvir okkum; tí at tú hevurt gjørt rætt, men vit hava gjørt vondliga:

34 Eiheldur hava kongar okkara, prinsar okkara, prestar okkara, ella fedrar okkara, hildið lóg tína, ella lýtt á tíni boð og tínar vitnisburðir, hvarvið tú vitnaðirt ímóti teimum.

35 Tí at teir hava ikki tænt tær í kongadømi sínum, og í tíni miklu góðsku sum tú gavst teimum, og í tí stóra og feita landinum sum tú gavst frammi fyri teimum, eiheldur vendu teir frá sínum vondu verkum.

36 Sí, vit *eru* tænarar henda dag, og *fyri* landið sum tú gavst okkara fedrum at eta tess ávøkst og tað góða hjá tí, sí, vit *eru* tænarar í tí:

37 Og tað letur mikla úrtøku at kongunum, hvørjar tú hevurt sett yvir okkum uppá grund av okkara syndum: teir eisini hava harradømi yvir okkara likamum, og yvir okkara fenaði, eftir lyst síni, og vit *eru* í miklari neyð.

38 Og uppá grund av øllum hesum gera vit ein tryggan *sáttmála,* og skriva *hann;* og okkara prinsar, Levitar, *og* prestar, innsigla *at honum.*

KAPITUL 10

NÚ, teir sum innsiglaðu *vóru,* Nê-hĕ-mī´-ăh, Tĭr-sjá´-thă-in, sonur Hăch-ă-lī´-ăh, og Zĭd-kī´-jăh,

2 Sĕ-raī´-ăh, Â-zăr´-jăh, Jeremiah,

3 Păsj´-ûr, Ă-măr´-jăh, Măl-chī´-jăh,

4 Hăt´-tûsj, Sjĕb-ă-nī´-ăh, Măl´-lŭch,

5 Hár´-ĭm, Mĕr´-ĕ-mōth, Ó-bă-dī´-ăh,

6 Dániel, Gĭn´-nĕ-thŏn, Bár´-ŭch,

7 Mĕ-sjŭl´-lăm, Á-bī-jăh, Mī´-jă-mĭn,

8 Mā-ă-zī´-ăh, Bĭl´-gâ-ī, Sjĕm-aī´-ăh: hesir *vóru* prestarnir.

9 Og Levitarnir: bæði Jē´-sjû-ă Ăz-ă-nī´-ăh sonur, Bĭn´-nû-ī av sonum Hĕn´-ă-dăd-s, Kăd´-mī-ĕl;

10 Og teirra brøður, Sjĕb-ă-nī´-ăh, Hó-dī´-jăh, Kê-lī´-tă, Pĕ-laī´-ăh, Há´-năn,

11 Mī´-chă, Rē´-hŏb, Hăsj-ă-bī´-ăh,

12 Zăc´-cûr, Sjĕr-ĕ-bī´-âh, Sjĕb-ă-nī´-ăh,

13 Hó-dī´-jăh, Bá´-nī, Bĕ-nī´-nû.

14 Teir fremstu av fólkinum;
Pá´-rŏsj, Pá´-hăth-mó´-ăb, Ē´-lăm, Zăt´-thû, Bá´-nī,
15 Bŭn´-nī, Azgad, Bē´-bā-ī,
16 Ăd-ō-nī´-jăh, Bĭg´-vâ-ī, Á´-dĭn,
17 Ā´-tĕr, Hĭz-kī´-jăh, Azzur,
18 Hó-dī´-jăh, Há´-sjŭm, Bē´-zâ-ī,
19 Hâr´-ĭph, Án´-ă-thōth, Nē´-bâ-ī,
20 Măg´-pī-ăsj, Mē-sjŭl´-lăm, Hē´-zîr,
21 Mē-sjēz´-ă-bē̆el, Zā´-dŏk, Jăd´-dû-ă,
22 Pē-lăt´-jăh, Há´-năn, Ă-nā´-ăh,
23 Hó-sjē´-ă, Hă-năn´-jăh, Hăsj´-ŭb,
24 Hăl-lō´-hĕsj, Pī´-lē-hă, Sjō´-bĕk,
25 Rē´-hŭm, Hă-sjăb´-năh, Mā-ă-sēj´-ăh,
26 Og Á´-hī-jăh, Há´-năn, Á´-năn,
27 Măl´-lŭch, Hár´-ĭm, Bā´-ă-năh.

28 ¶ Og restin av fólkinum, prestarnir, Levitarnir, duravørðirnir, sangararnir, Nēth-ī-nĭm´-arnir, og allir teir sum høvdu atskilt seg sjálvar frá fólki landanna at lóg Guðs, konur teirra, synir teirra, og døtur teirra, hvør *og* ēin havandi kunnleika, og havandi skilning;

29 Teir krøktust til brøður sínar, tignarmenn sínar, og inngingu inn í eina banning, og inn í ein eið, *um* at ganga í lóg Guðs, sum varð givin við Mósesi, tænara Guðs, og at gáa eftir og gera øll boðini hjá HARRANUM Harra várum, og hansara dómar og hans ásetingar;

30 Og at vit vildu ikki geva okkara døtur at fólki landsins, ella taka døtur teirra til sona vára:

31 Og *um* fólk landsins komi við vøru ella nøkrum vistum á sabbatsdeginum at selja, *at* vit vildu ikki keypa tað frá teimum á sabbatinum, ella á hinum heilaga degi: og *at* vit vildu eftirlata hitt sjeynda árið, og innkrevjingina av hvørjari skuld.

32 Eisini gjørdu vit regluskipanir til okkara, at áleggja okkum sjálvum árliga við triðjingspartinum av einum sjē´-kŭl-i til tænastu húsar Guðs várs;

33 Til sýnisbreyðið, og til tað áframhaldandi matofrið, og til tað áframhaldandi brenniofrið, av sabbatunum, av nýmánunum, til tær ásettu hátíðirnar, og til tey heilagu *tingini,* og til syndofrini til at gera eina sáttargerð fyri Ísrael, og *til* alt arbeiði húsar Guðs várs.

34 Og vit kastaðu lutirnar millum prestanna, Levitanna, og fólksins, um við˙ofrið, at føra *tað* inn í hús Guðs várs, eftir húsum fedra vára, til tíðir ásettar ár um ár, at brenna uppiá altari HARRANS Guðs várs, eins og skrivað *stendur* í lógini:

35 Og at føra frumávøkstirnar av lendi várum, og frumávøkstirnar av øllum ávøksti av øllum trøum, ár um ár, at húsi HARRANS:

36 Eisini hinar fyrstuføddu av sonum várum, og av fenaði várum, eins og skrivað *stendur* í lógini, og frumavkomið av okkara stórfæafylgjum og av okkara smáfæafylgjum, at føra til húsar Guðs várs, at prestunum sum tæna í húsi Guðs várs:

37 Og *at* vit skuldu føra frumávøkstirnar av deiggi várum, og offur vári, og ávøkstirnar av øllum háttarlagi av trøum, av víni og av olju, at prestunum, til herbergja húsar Guðs várs; og tíggjundirnar av lendi várum at Levitunum, at hinir somu Levitar máttu hava tíggjundirnar í øllum staðunum av veltan vári.

38 Og presturin, sonur Aarons, skal vera hjá Levitunum, tá ið Levitarnir taka tíggjundir: og Levitarnir skulu føra niðan tíggjundina av tíggjundunum at húsi Guðs várs, til herbergjanna, inn í goymsluhúsið.

39 Tí at børn Ísraels og børn Levīs skulu koma við ofrinum av korninum, av tí nýggja víninum, og oljuni, at herbergjunum, hvar *eru* ker halgidómsins, og prestarnir sum tæna, og duravørðirnir, og sangararnir: og vit vilja ikki yvirgeva hús Guðs várs.

KAPITUL 11

OG stjórnararnir av fólkinum búðu í Jerusalem: restin av fólkinum eisini kastaði lutir, at føra ein av tíggju til at dvøljast í Jerusalem, hinum heilaga staði, og níggju partar *at búgva* í *øðrum* staðum.

2 Og fólkið vælsignaði allar menninar, sum viljugliga ofraðu seg sjálvar at dvøljast í Jerusalem.

3 ¶ Nú, hesir *eru* teir fremstu av fylkinum sum búðu í Jerusalem: men í staðunum av Judah búði hvør *og* ein í ogn síni í staðum sínum, *tað vil siga,* Ísrael, prestarnir, og Levitarnir, og Nethīnīm′arnir, og børnini hjá tænarum Sálomons.

4 Og í Jerusalem búðu *ávísir* av børnum Judah, og av børnum Benjamins. Av børnum Judah; Athā′āh Uzzī′āh sonur, Zĕchăr′jāh sonar, Amăr′jāh sonar, Sĕphăt′jāh sonar, Mahāl′ālēēl-s sonar, av børnum Pērēz-ar;

5 Og Māăsēj′āh Bár′ūch-s sonur, Cōlhō′zēh sonar, Hăzāī′āh sonar, Adāī′āh sonar, Jōī′arīb-s sonar, Zĕchăr′jāh sonar, Sjīlō′nī-s sonar.

6 Allir synir Pē′rēz-ar, sum búðu í Jerusalem, *vóru* fýra hundrað *og* trísinstjúgu og átta reystir menn.

7 Og hesir *eru* synir Benjamins; Sāl′lú Mĕsjūl′lām-s sonur, Jó′ĕd-s sonar, Pēdāī′āh sonar, Kōlāī′āh sonar, Māăsēj′āh sonar, Ī′thīēl-s sonar, Jĕsāī′āh sonar.

8 Og eftir hann Găbbāī, Sāllā′ī, níggju hundrað *og* tjúgu og átta.

9 Og Jó′ēl Zīchrī′s sonur *var* umsjónarmaður teirra: og Judah Sĕnū′āh sonur *var* næstur yvir staðinum.

10 Av prestunum: Jĕdāī′āh Jōī′ārīb-s sonur, Já′chīn.

11 Sĕrāī′āh Hīl′kīāh sonur, Mĕsjūl′lām-s sonar, Zā′dōk-s sonar, Mĕrāī′ōth-s sonar, Á′hītūb-s sonar, *var* stjórnari húsar Guðs.

12 Og teirra brøður, sum gjørdu arbeiði hússins, *vóru* átta hundrað *og* tjúgu og tveir: og Adāī′āh Jĕró′hām-s sonur, Pēlālī′āh sonar, Amzī-s sonar, Zĕchăr′jāh sonar, Pāsj′ûr-s sonar, Mál′chīâh sonar,

13 Og hansara brøður, fremstir av fedrunum, tvey hundrað *og* fjøruti og tveir: og Á′māsjāī Azá′rĕēl-s sonur, Á′hăsāī-s sonar, Mĕsjīl′lēmōth-s sonar, Ím′mēr-s sonar,

14 Og teirra brøður, mektigir reystsemis menn, eitt hundrað *og* tjúgu og átta: og teirra umsjónarmaður *var* Zăbdī′ēl, sonurin at *ēinum av* teimum mektigu monnunum.

15 Eisini av Levitunum: Sjēmāī′āh Hāsj′ūb-s sonur, Az′rīkām-s sonar, Hāsjăbī′āh sonar, Būnnī-s sonar;

16 Og Sjăbbĕthāī og Jó′zăbād, av hinum fremstu av Levitunum, *høvdu* umsjónina av hinum útvortis gerningi húsar Guðs.

17 Og Mättănī′āh Mī′chă sonur, Zăbdī-s sonar, Á′săph-s sonar, *var* hin fremsti til at byrja takkarveitanina í bøn: og Bākbûkī′āh — hin næsti millum brøðra sína, og Abda Sjămmû′ă sonur, Gá′lāl-s sonar, Jēdūthûn-s sonar.

18 Allir Levitarnir í hinum heilaga staði *vóru* tvey hundrað *og* fýrsinstjúgu og fýra.

19 Harafturat duravørðirnir, Ak′kûb, Tāl′mōn, og teirra brøður sum varðaðu portrini, *vóru* eitt hundrað *og* sjeyti og tveir.

20 ¶ Og tað eftirverandi av Ísrael, av prestunum, *og* Levitunum, *vóru* í øllum staðum Judah, hvør *og* ein í arvi sínum.
21 Men Nĕth-ĭ-nĭm´-arnir dvaldust í Ō´-phĕl: og Zĭ´-hă og Gĭs´-pă *vóru* yvir Nĕth-ĭ-nĭm´-unum.
22 Umsjónarmaðurin eisini hjá Levitunum í Jerusalem *var* Úz´-zĭ, sonur Bá´-nĭ-s, sonar Hăsj-ă-bī´-ăh, sonar Măt-tă-nī´-ăh, sonar Mī´-chă. Av sonum Á´-săph-s *vóru* sangararnir yvir gerningi húsar Guðs.
23 Tí at *tað var* boðið hjá kongi viðvíðjandi teimum, at ein ávísur skamtur skuldi vera til sangaranna, skyldigur til hvønn dag.
24 Og Pĕth-ă-hī´-ăh Mĕ-sjĕz´-ă-bĕ´ĕl-s sonur, av børnum Zĕ´-râh Judah sonar, *var* hjá" kongsins hond í øllum málum viðvíkjandi fólkinum.
25 Og fyri bygdirnar, við akrum teirra, búðu *summir* av børnum Judah í Kĭr´-jăth-âr´-bă, og *í* bygdum tess, og í Dī´-bŏn, og *í* bygdum tess, og í Jĕ-kăb´-zĕ´ĕl, og *í* bygdum tess,
26 Og í Jĕ´-sjû-ă, og í Mō-lā´-dŭh, og í Bĕth´-phĕ-lĕt,
27 Og í Hā´-zâr-sjŭ´-ăl, og í Bē´ĕr´-sjĕ-bŭ, og *í* bygdum tess,
28 Og í Ziklag, og í Mĕ-kō´-năh, og í bygdum tess,
29 Og í Ēn-rĭm´-mŏn, og í Zăr-ē´-ăh, og í Jâr´-mûth,
30 Zā-nō´-ăh, Adullam, og *í* bygdum teirra, í Lá´-chĭsj, og akrum tess, í Ă-zē´-kăh, og *í* bygdum tess. Og teir dvaldust frá Bē´ĕr´-sjĕ-bŭ at dali Hĭn´-nŏm-s.
31 Børnini eisini hjá Benjamin frá Gĕ´-bă *dvaldust* í Mĭch´-măsj, og Aĭ´-já, og Beth-el, og *í* bygdum teirra,
32 *Og* í Án´-ă-thōth, Nôb, Ă-năn´-jăh,
33 Hā´-zôr, Rá´-măh, Gĭt-tā´-ĭm,
34 Há´-dĭd, Zē´-bō-ĭm, Nĕ-băl´-lăt,
35 Lōd, og Ō´-nō, dali handverkaranna.
36 Og av Levitunum *vóru* deildir *í* Judah, *og* í Benjamin.

KAPITUL 12

NÚ, hesir *eru* prestarnir og Levitarnir, sum fóru upp við Zĕ-rūb-bá´-bĕl-i Sjê-ăl´-tī-ĕl-s syni, og Jĕ´-sjû-ă: Sĕ-raĭ´-ăh, Jeremiah, Ezra,
2 Ă-măr´-jăh, Măl´-lŭch, Hăt´-tŭsj,
3 Sjĕch-ăn´-jăh, Rē´-hŭm, Mĕr´-ĕ-mōth,
4 Ĭd´-dō, Gĭn´-nĕ-thō, Á´-bĭ-jăh,
5 Mĭ´-ă-mĭn, Má-ă-dī´-ăh, Bĭl´-găh,
6 Sjĕm-aĭ´-ăh, og Jôĭ´-ă-rĭb, Jĕ-daĭ´-ăh,
7 Săl´-lû, Á´-mŏk, Hĭl´-kĭ-ăh, Jĕ-daĭ´-ăh. Hesir *vóru* teir fremstu av prestunum og av brøðrum teirra á døgum Jē´-sjû-ă.
8 Harafturat Levitarnir: Jē´-sjû-ă, Bĭn´-nû-ī, Kăd´-mĭ-ĕl, Sjĕr-ĕ-bī´-âh, Judah, *og* Măt-tă-nī´-ăh, *sum var* yvir takkarveitingini, hann og brøður hansara.
9 Eisini Băk-bû-kĭ´-ăh og Ŭn´-nī, teirra brøður, *vóru* yvir av teimum í vaktunum.
10 ¶ Og Jē´-sjû-ă gat Jôĭ´-ă-kĭm, Jôĭ´-ă-kĭm eisini gat Ē´-lĭ-ăsj-ĭb, og Ē´-lĭ-ăsj-ĭb gat Jôĭ´-ă-dă,
11 Og Jôĭ´-ă-dă gat Jónathan, og Jónathan gat Jăd´-dû-ă.
12 Og í døgum Jôĭ´-ă-kĭm-s vóru prestar, teir fremstu av fedrunum: av Sĕ-raĭ´-ăh, Mĕ-raĭ´-ăh; av Jeremiah, Hă-năn´-jăh;
13 Av Ezra, Mĕ-sjŭl´-lăm; av Ă-măr´-jăh, Jĕ-hó´-hă-năn;
14 Av Mĕl´-ĭ-cû, Jónathan; av Sjĕb-ă-nī´-ăh, Jóseph;
15 Av Hár´-ĭm, Adna; av Mĕ-raĭ´-ōth, Hĕl-kā´-ĭ;
16 Av Ĭd´-dō, Zĕch-ăr´-jăh; av Gĭn´-nĕ-thŏn, Mĕ-sjŭl´-lăm;
17 Av Á´-bĭ-jăh, Zĭch´-rĭ; av Mĭn´-ĭ-ă-mĭn, av Mó-ă-dī´-ăh, Pĭl-tā´-ĭ;

18 Av Bĭl´-găh, Sjăm´-mû-ă; av
Sjĕm-a͡î´-ăh, Jĕ-hó´-nă-thăn;
19 Og av Jo͡î´-ă-rĭb, Măt-tē´-na͡î; av Jĕ-da͡î´-ăh, Ŭz´-zī;
20 Av Săl-lā´-ī, Kăl-lā´-ī; av Á´-mŏk, Ē´-bĕr;
21 Av Hĭl´-kĭ-ăh, Hăsj-ă-bī´-ăh; av Jĕ-da͡î´-ăh, Nĕth-á´-nē͡el.
22 ¶ Levitarnir á døgum Ē´-lĭ-ăsj-ĭb-s, Jo͡î´-ă-dă, og Jó´-hâ-năn-s, og Jăd´-dû-ă, *vóru* skrásettir fremstir av fedrunum: eisini prestarnir, til ríkjan Dá´-rĭ-ŭs-ar hins Persiska.
23 Synir Levīs, hinir fremstu av fedrunum, *vóru* skrivaðir í bók krýniknanna, enntá inntil dagar Jó´-hâ-năn-s Ē´-lĭ-ăsj-ĭb-s sonar.
24 Og hinir fremstu av Levitunum: Hăsj-ă-bī´-ăh, Sjĕr-ĕ-bī´-âh, og Jē´-sjû-ă Kăd´-mĭ-ĕl-s sonur, við brøðrum sínum yvir av teimum, til at prísa *og* at veita tøkkir, samsvarandi við áboðið hjá Dávidi Guðs manni, vørður yvir av vørði.
25 Măt-tă-nī´-ăh, og Băk-bû-kī´-ăh, Ó-bă-dī´-ăh, Mē-sjŭl´-lăm, Tăl´-mŏn, Ăk´-kŭb, *vóru* duravørðir, haldandi varðhaldið við gáttirnar av portrunum.
26 Hesir *vóru* á døgum Jo͡î´-ă-kĭm-s Jē´-sjû-ă sonar, Jó´-ză-dăk-s sonar, og á døgum Nē-hĕ-mī´-ăh landsstjórnara, og Ezra prests, hins skriftlærda.
27 ¶ Og við innvígingina av múri Jerusalems søktu teir Levitarnar út úr øllum plássum teirra, at føra teir til Jerusalem, at halda innvígingina við gleði, bæði við takkarveitingum, og við synging, *við* glymskálum, ps͡oltrum, og við hørpum.
28 Og synirnir hjá sangarunum savnaðu seg saman, bæði úr slættlendinum rundan um Jerusalem, og frá bygdum Nĕ-tô͡ph´-ă-tī-s;
29 Eisini frá húsi Gĭl´-găl-s, og úr akrunum av Gē´-bă og Ăz-má´-vĕth: tí at sangararnir høvdu bygt sær bygdir rundan um Jerusalem.
30 Og prestarnir og Levitarnir skírgaðu seg sjálvar, og skírgaðu fólkið, og portrini, og múrin.
31 Tá førdi eg upp prinsarnar av Judah uppá múrin, og útnevndi tveir stórar *flokkar av teimum sum veittu* tøkkir, *hvarav ēin* fór til høgru handar uppiá múrinum ímóti mykju-liðinum:
32 Og aftaná teimum fór Hósja͡î´-ăh, og helvt*in* av prinsunum av Judah,
33 Og Â-ză´-jăh, Ezra, og Mĕsjŭl´-lăm,
34 Judah, og Benjamin, og Sjĕm-a͡î´-ăh, og Jeremiah,
35 Og *ávísir* av prestasonunum við lúðrum; *nevniliga*, Zĕc͡h-ăr´-jăh Jónathans sonur, Sjĕm-a͡î´-ăh sonar, Măt-tă-nī´-ăh sonar, Mīc͡hâ´-ăh sonar, Ză´-cûr-s sonar, Á´-săp͡h-s sonar:
36 Og hansara brøður, Sjĕm-a͡î´-ăh, og Â-zá´-ră-ĕl, Mĭl´-ă-la͡î, Gĭl´-ă-la͡î, Mā-ā´-ī, Nĕth-á´-nē͡el, og Judah, Hă-nā´-nī, við tónleiks-ljóðførum Dávids — Guðs mansins, og Ezra hin skriftlærdi frammanfyri teimum.
37 Og við keldu-liðið, sum var yvir av teimum, fóru teir upp við trappurnar av staði Dávids, við niðanfaringina av múrinum, omanfyri hús Dávids, alt at vatnliðinum eystanfyri.
38 Og hīn *flokkurin av teimum sum veittu* tøkkir fór yvir av *teimum,* og eg aftaná teimum, og helmingurin av fólkinum uppiá múrinum, frá handanfyri bræðsluovna-tornið enntá at breiða múri;
39 Og frá uppiyvir Ē´-p͡hră-ĭm-sliðinum, og uppiyvir gamla-liðinum, og uppiyvir fiska-liðinum, og Hăn´-ă-nē͡el-s-torninum, og torni Mē´-ăh, enntá at seyðaliðinum: og teir stóðu stillir í fongsuls-liðinum.
40 So stóðu teir tveir *flokkarnir av teimum sum veittu* tøkkir í húsi

Guðs, og eg, og helmingurin av stjórnarunum við mær:

41 Og prestarnir; Ē´-lī-ă-kĭm, Mā-ă-sĕj´-ăh, Mĭn´-ĭ-ă-mĭn, Mī-chāĭ´-ăh, Ē-lī-ō´-ē-nāĭ, Zĕch-ăr´-jăh, *og* Hă-năn´-jăh, við lúðrum;

42 Og Mā-ă-sĕj´-ăh, og Sjĕm-āĭ´-ăh, og Ēl-ē-ā´-zâr, og Úz´-zī, og Jē-hó´-hă-năn, og Măl-chī´-jăh, og Ē´-lăm, og Ē´-zĕr. Og sangararnir sungu hart, við Jĕz-ră-hī´-ăh, umsjónarmanni *sínum*.

43 Teir eisini ofraðu tann dagin mikil sláturoffur, og fegnaðust: tí at Guð hevði fingið teir at fegnast við miklari frøi: ektakonurnar eisini og børnini fegnaðust: so at frøin hjá Jerusalem hoyrdist enntá langt burturifrá.

44 ¶ Og á teirri tíðini vórðu summir útnevndir yvir herbergjunum til dýrgripirnar, til ofrini, til frumávøkstirnar, og til tíggjundirnar, at savna inn í tey av akrum staðanna skamtir lógarinnar til prestanna og Levitanna: tí at Judah fegnaðist um prestarnar og um Levitarnar sum vartaðu.

45 Og bæði sangararnir og duravørðirnir hildu vakt Guðs síns, og vakt skírganarinnar, samsvarandi við áboðið hjá Dávidi, *og* hjá Sálomon, syni hansara.

46 Tí á døgum Dávids og Á´-săph-s frá gomlum *av funnust tað* fremstir av sangarunum, og sangir av *lov*prísan og takkarveitan at Guði.

47 Og allur Ísrael á døgum Zĕ-rūb-bá´-bĕl-s, og á døgum Nē-hĕ-mī´-ăh, góvu skamtirnar hjá sangarunum og duravørðunum, hvønn dag hansara skamt: og teir halgaðu Levitunum *heilagar lutir;* og Levitarnir halgaðu Aarons børnum *teir*.

KAPITUL 13

Á TÍ degi lósu teir í bók Mósesar í áhoyrn fólksins; og harí varð funnið skrivað, at Ammonitin og Móabitin skuldu ikki koma inn í samkomu Guðs um ævir;

2 Av tí at teir møttu ikki børnum Ísraels við breyði og við vatni, men leigaðu Bálaam ímóti teimum, at hann skuldi banna teir: hvussu enn er, Guð okkara vendi banningini yvirí eina signing.

3 Nú, tað bar á, tá ið teir høvdu hoyrt lógina, at teir atskildu frá Ísrael alla hina blandaðu múgvu.

4 ¶ Og áðrenn hetta *var* Ē´-lĭ-ăsj-ĭb prestur, havandi umsjónina av herbergi húsar Guðs várs, samgingin at Tó´-bĭ-ăh:

5 Og hann hevði fyribúgvið til hansara eitt mikið herbergi, hvar áðurfyrr teir løgdu matofrini, roykilsið, og kerini, og tíggjundirnar av korninum, tí nýggja víninum, og oljuni, sum varð áboðið *at verða givið* til Levitanna, og sangaranna, og duravørðanna; og ofrini hjá prestunum.

6 Men í alla hesa *tíð* var ikki eg í Jerusalem: tí at í tí tvey og tríatiunda árinum hjá Ăr-tă-xĕrx´-ēs-i kongi av Bábylon kom eg at kongi, og eftir ávísar dagar lutaðist mær *heim*loyvi av kongi:

7 Og eg kom til Jerusalem, og skilti um tað illa sum Ē´-lĭ-ăsj-ĭb gjørdi fyri Tó´-bĭ-ăh, í at fyribúgva honum eitt herbergi í forgørðum húsar Guðs.

8 Og tað harmaði meg sára: eg tessvegna kastaði út øll húshaldstingini hjá Tó´-bĭ-ăh út úr herberginum.

9 Tá bjóðaði eg, og teir reinsaðu herbergini: og hagar førdi eg aftur ker˙ húsar Guðs, við matofrinum og roykilsinum.

10 ¶ Og eg varnaðist, at skamtirnir hjá Levitunum høvdu ikki verðið givnir *teimum:* tí at Levitarnir og sangararnir, sum gjørdu arbeiðið, vóru flýddir hvør *og* ēin til akur sín.

11 Tá stríddi eg við stjórnararnar, og segði, Hví er hús Guðs yvirgivið? Og eg savnaði teir saman, og setti teir uppá plass.
12 Tá førdi alt Judah tíggjundina av korninum og tí nýggja vínínum og oljuni at goymslubúrunum.
13 Og eg gjørdi goymslumeistarar yvir goymslubúrunum, Sjělě-mī´-ăh prest, og Zā´-dŏk hin skriftlærda, og av Levitunum, Pĕdā´-ăh: og næst mót teimum *var* Há´-năn Zăc´-cûr-s sonur, Măt-tă-nī´-ăh sonar: tí at teir vórðu taldir trúfastir, og teirra embæti *var* at útbýta brøðrum sínum.
14 Minst til mín, O Guð mín, viðvíkjandi hesum, og strúka ikki út mínar góðu gerðir sum eg havi gjørt fyri hús Guðs míns, og fyri embætir tess.
15 ¶ Í teimum døgum sá eg í Judah *summar,* treðandi vínførg á sabbatinum, og førandi inn bundir, og løðandi asnar; eins og eisini vín, víndrúvur, og fikur, og alt *háttarlag av* byrðum, sum teir førdu inn í Jerusalem á sabbatsdeginum: og eg vitnaði *ímóti teimum* á tí degi, í hvørjum teir seldu vistir.
16 Tað búðu menn úr Týrus eisini harí, sum førdu fisk, og alt háttarlag av vøru, og seldu á sabbatinum at Judah børnum, og í Jerusalem.
17 Tá stríddi eg við tignarmenninar av Judah, og segði við teir, Hvat ilt ting *er* hetta sum tit gera, og halgispotta sabbatsdagin?
18 Gjørdu ikki fedrar tykkara svá, og førdi ikki Guð okkara alt hetta illa uppá okkum, og uppá henda stað? tó føra tit meiri vreiði uppá Ísrael við at halgispotta sabbatin.
19 Og tað bar á, at tá ið portrini av Jerusalem byrjaðu at verða myrk áðrenn sabbatin, ábjóðaði eg at portrini skuldu verða lokaði, og álegði, at tey skuldu ikki verða upplatin til eftir sabbatin: og *summar* av tænarum mínum setti eg við portrini, *at* tað skuldi eingin byrða verða førd inn á sabbatsdeginum.
20 So handilsmenninir og seljararnir av alskyns vøru hildu til uttanfyri Jerusalem ēina ferð ella tvær ferðir.
21 Tá vitnaði eg ímóti teimum, og segði við teir, Hví halda tit til kring múrin? um tit geri *soleiðis* aftur, vil eg leggja hendur á tykkum. Frá tí tíðini fram komu teir ei *meira* á sabbatinum.
22 Og eg ábjóðaði Levitunum, at teir skuldu reinsa seg, og *at* teir skuldu koma *og* vakta portrini, at halga sabbatsdagin. Minst til mín, O Guð mín, *viðvíkjandi* hesum við, og spara meg samsvarandi við mikilleikan av miskunn tíni.
23 ¶ Í teimum døgum eisini sá eg Jødar *sum* høvdu gift *seg við* konum úr Ăsj´-dŏd, úr Ammon, *og* úr Móab:
24 Og teirra børn talaðu hálvt í talu Ăsj´-dŏd-s, og dugdu ikki *at* tala á Jødanna máli, men samsvarandi við málið hjá hvørjum fólki.
25 Og eg stríddi við teir, og bannaði teir, og sló ávísar av teimum, og sleit av hárið hjá teimum, og fekk teir *at* svørja við Guð, *sigandi,* Tit skulu ikki geva døtur tykkara at sonum teirra, ella taka døtur teirra at sonum tykkara, ella til tykkara sjálvs.
26 Syndaði ikki Sálomon kongur av Ísrael við hesum tingum? tó millum mangar tjóðir var tað eingin kongur líka *sum* hann, sum var háttelskaður av Guði sínum, og Guð gjørdi hann *til* kong yvir øllum Ísrael: hóast hetta, sjálvt honum voldu útlendskar kvinnur at synda.

27 Skulu vit tá lýða á tykkum til at gera alt hetta mikla illa, at brótast ímóti Guði várum í at gifta *okkum við* fremmandum ektakonum?

28 Og *ein* av sonum Jōı´-ă-dă, sonar Ē´-lĭ-ăsj-ĭb-s høvuðsprests, *var* versonur til Săn-băl´-lăt-s Hór-ŏn-īt´-a: tí elti eg hann frá mær.

29 Minst til teirra, O Guð mín, av tí at teir hava dálkað prestadømið, og sáttmála prestadømisins, og Levitanna.

30 Soleiðis reinsaði eg teir frá øllum fremmandum, og útnevndi vørðirnar hjá prestunum og Levitunum, hvønn *og* ein í gerning sín;

31 Og til viðˊ-ofrið, til ásettar tíðir, og til frumávøkstirnar. Minst til mín, O Guð mín, til góðar.

ESTHERAR BÓK.

KAPITUL 1

NÚ, tað bar á í døgum Ă-hăs-vē´-rūs-ar, (hetta *er* Ă-hăs-vē´-rūs sum ráddi frá Indiu enntá at Ê-thĭ-ō´-pĭ-u, *yvir* eitt hundrað og sjey og tjúgu fylkjum:)

2 *Át* í teimum døgum, tá ið kongurin Ă-hăs-vē´-rūs sat á hásæti kongadømis síns, sum *var* í Sjū´-sjăn slottinum,

3 Í tí triðja árinum av ríkjan hansara, gjørdi hann eina veitslu yvirfyri øllum prinsum sínum og tænarum sínum; valdini av Persiu og Mediu, tignarmenn og prinsar fylkjanna, *verandi* frammi fyri honum:

4 Tá ið hann sýndi ríkidømini av dýrdsama kongadømi sínum og heiðurin av frálíku hátign síni mangar dagar, *enntá* eitt hundrað og fýrsinstjúgu dagar.

5 Og tá ið hesir dagarnir vóru útrunnir, gjørdi kongurin øllum fólkinum, sum vóru tilstaðar í Sjū´-sjăn slottinum, eina veitslu, bæði miklum og smáum, sjey dagar, í forgarðinum av urtagarðinum av slotti kongsins;

6 *Hvar vóru* hvítar, grønar, og bláar, *tjaldváðir,* festar við bondum av fínum líni og purpuri til silvur ringar og súlur av marmori: legurnar *vóru av* gulli og silvuri, uppiá einum palli av reyðum, og bláum, og hvítum, og svørtum, marmori.

7 Og teir góvu *teimum* drekka í kerum av gulli, (kerini verandi ymis hvørt frá øðrum,) og kongligt vín í ríkiligleika, samsvarandi við støðu kongsins.

8 Og drekkingin *var* samsvarandi við lógina; eingin noyddi: tí at kongur so hevði fyriskipað fyri øllum yvirmonnum húss síns, at teir skuldu gera samsvarandi við vild hvørs mans.

9 Eisini Vasjtī drotning gjørdi eina veitslu til kvinnurnar *í* hinum kongliga húsi sum *hoyrdi* til Ă-hăs-vē´-rūs-ar kongs.

10 ¶ Á hinum sjeynda degi, tá ið hjartað hjá kongi var kátt við víni, ábjóðaði hann Mĕ-hū´-măn-i, Bĭz´-thă, Hâr-bō´-nă, Bĭg´-thă, og Ă-băg´-thă, Zē´-thâr-i, og Cār´-căs-i, teimum sjey kamarsharrunum sum tæntu í nærveru Ă-hăs-vē´-rūs-ar kongs,

11 At føra Vasjtī drotning framfyri kong við hini kongligu krúnu, at sýna fólkinum og prinsunum hennara vakurleika: tí at hon *var* fríð á at líta.

12 Men drotningin Vasjtī sýtti at koma við áboðið hjá kongi viðˆ

kamarsharrum *hansara:* tí varð kongur sera vreiður, og hans øði brann í honum.

13 ¶ Tá segði kongur til vísmannanna, sum kendu tíðirnar, (tí at soleiðis *var* háttarlag kongsins mótvegis øllum sum kendu lóg og dóm:

14 Og hin næsti at honum *var* Cår-sjē´-nă, Sjē´-thâr, Ăd-mā´-thă, Tarsjisj, Mē´-rēs, Mâr-sē´-nă, *og* Mē´-mū-căn, teir sjey prinsarnir av Persiu og Mē´-dī-ŭ, sum sóu andlit kongs, *og* sum sótu hinir fyrstu í kongadømunum;)

15 Hvat skulu vit gera innat drotningini Vasjtī samsvarandi við lógina, av tí at hon hevur ikki útint boðið hjá konginum Ă-hăs-vē´-rūs-i viðˆ kamarsharrunum?

16 Og Mē´-mū-căn svaraði frammi fyri kongi og prinsunum, Vasjtī drotning hevur ikki gjørt rangt við kong einans, men eisini við allar prinsarnar, og við alt fólkið sum *eru* í øllum fylkjunum hjá konginum Ă-hăs-vē´-rūs-i.

17 Tí at *henda* gerð drotningarinnar skal koma útum at øllum kvinnum, so at tær skulu vanvirða ektamenn sínar í eygum sínum, tá ið tað skal verða fráboðað, Kongurin Ă-hăs-vē´-rūs ábeyð, *at* Vasjtī drotning *skuldi* verða førd inn framfyri hann, men hon kom ikki.

18 *Líkaleiðis* skulu frúvurnar av Persiu og Mediu siga henda dag við allar kongsins prinsar, sum hava hoyrt um gerðina hjá drotningini. Soleiðis *skal tað reisast* ov mikil vanvirðing og vreiði.

19 Um tað hóvi kongi, lat tað fara ein konglig ábjóðan frá honum, og lat tað verða skrivað millum lógir Persanna og Medanna, at tað verði ikki broytt, At Vasjtī komi ei meira framfyri Ă-hăs-vē´-rūs kong; og lat kong geva hennara kongligu støðu at eini aðrari, sum er betri enn hon.

20 Og tá ið løgskipan kongsins, sum hann skal gera, skal verða kunngjørd út gjøgnum alt hansara ríki, (tí at tað er mikið,) skulu allar ektakonurnar geva til sínar ektamenn heiður, bæði til miklar og smáar.

21 Og framsøgnin hóvaði kongi og prinsunum; og kongur gjørdi samsvarandi við orðið hjá Mē´-mū-căn:

22 Tí at hann sendi brøv inn í øll fylkir kongsins, inn í hvørt fylki samsvarandi við skrift tess, og til hvørt fólk eftir tungumáli teirra, at hvør maður skuldi bera stjórn í egna húsi sínum, og at *tað* skuldi verða kunngjørt samsvarandi við tungumálið hjá hvørjum fólki.

KAPITUL 2

EFTIR hesar lutir, tá ið vreiði Ă-hăs-vē´-rūs-ar kongs var sissað, mintist hann Vasjtī, og hvat hon hevði gjørt, og hvat var fyriskipað ímóti henni.

2 Tá søgdu kongsins tænarar sum tæntu at honum, Latið fagrar ungar jomfrýr verða søktar fyri kong:

3 Og latið kong útnevna yvirmenn í øllum fylkjum kongadømis síns, at teir mega savna saman allar hinar føgru ungu jomfrýr at Sjū´-sjăn slottinum, til húsar kvennanna, at umsjón Hē´-gê-s, kamarsharra kongs, varðmanni kvennanna; og latið teirra ting˘ til skírganar verða givin *teimum:*

4 Og latið moynna, sum toknast kongi, verða drotning ístaðin fyri Vasjtī. Og tað tingið hóvaði kongi; og hann so gjørdi.

5 ¶ *Nú,* í Sjū´-sjăn slottinum var ein ávísur Jødi, hvørs navn *var* Mŏr´-dĕ-caî Já´-īr-s sonur, Sjīm´-ĕ-ī-s sonar, Kisj sonar, ein Benjamiti;

6 Hvør hevði verðið borin burtur frá Jerusalem við fanga-

skapinum sum hevði verðið borin burtur við Jēc-ō-nī´-ăh kongi av Judah, hvønn Nĕ-bū-chăd-nēz´-zâr, kongur Bábylons, hevði borið burtur.

7 Og hann førdi upp Hă-dăs´-sŭh, tað *er* Esther, dóttur faðirbróður síns: tí hon hevði hvørki faðir ella móður, og moyggin *var* fríð og føgur; hvørja Mŏr´-dĕ-câi, tá ið faðir og móðir hennara vóru deyð, tók sum sína egnu dóttur.

8 ¶ So tað bar á, tá ið áboðið hjá kongi og hansara løgskipan varð hoyrt, og tá ið mangar moyggjar vórðu savnaðar saman at Sjū´-sjăn slottinum, til umsjónar Hē´-gâi-s, at Esther varð førd eisini at kongshúsinum, til umsjónar Hē´-gâi-s, varðmans kvennanna.

9 Og moyggin toknaðist honum, og henni lutaðist blídni av honum; og hann skundisliga gav henni hennara ting˘ til skírganar, við slíkum tingum sum hoyrdu til hennara, og sjey moyggjar, *sum vóru* hóskiligar at verða givnar henni, úr kongshúsinum: og hann frambar hana og hennara moyggjar at tí besta *plássinum* av húsi kvennanna.

10 Esther hevði ikki sýnt fólk sítt ella ættarfólk sítt: tí at Mŏr´-dĕ-câi hevði álagt henni, at hon skuldi ikki sýna *tað*.

11 Og Mŏr´-dĕ-câi gekk hvønn dag framfyri forgarðin av húsi kvennanna, at vita hvussu Estheri gekst, og hvat verða skuldi av henni.

12 ¶ Nú, tá ið túrurin hjá hvørji moyggj var komin at fara inn til Ă-hăs-vē´-rŭs-ar kongs, eftir at hon hevði verið tólv mánaðir, samsvarandi við háttarlag kvennanna, (tí at soleiðis vórðu dagarnir av teirra skírganum fullførdir, *tað vil siga,* seks mánaðir við olju av myrrhu, og seks mánaðir við søtum angilsum, og við *øðrum* tingum til skírgan kvennanna;)

13 Tá kom soleiðis *hvør* moyggj at kongi; hvatsumhelst hon tráaði, varð givið henni at fara við henni út úr húsi kvennanna at húsi kongsins.

14 Um kvøldið fór hon, og um morgisárið vendi hon aftur inn í hitt annað hús kvennanna, til umsjónar Sjā-ăsj´-găz-ar, kamarsharra kongsins, sum varðaði medkonurnar: hon kom inn at kongi ei meira, uttan kongur fragdaðist í henni, og at hon varð kallað við navni.

15 ¶ Nú, tá ið túrurin hjá Estheri Á-bī-hâil-s dóttur, faðirbróður Mŏr´-dĕ-câi-s, hvør hevði tikið hana sum dóttur sína, var komin at fara inn at kongi, kravdi hon einkið uttan hvat Hē´-gâi, kamarsharri kongs, varðmaður kvennanna, útpeikaði. Og Esther vann yndi í eygsjónini hjá øllum teimum sum hugdu uppá hana.

16 So Esther varð tikin til Ă-hăs-vē´-rŭs-ar kongs inn í hansara kongliga hús í hinum tíggjunda mánaði, sum *er* mánaðurin Tē´-bĕth, í hinum sjeynda ári av ríkjan hans.

17 Og kongur elskaði Esther uppum allar kvinnurnar, og hon vann náði og yndi í eygsjón hansara meir enn allar jomfrýrnar; so at hann setti hina kongligu krúnu uppá høvur hennara, og gjørdi hana *til* drotning ístaðin fyri Vasjtī.

18 So gjørdi kongur øllum prinsum sínum og tænarum sínum eina mikla veitslu, *enntá* veitsluna hjá Estheri; og hann inti eina leyslating hjá fylkjunum, og gav gávur, samsvarandi við støðu kongsins.

19 Og tá ið jomfrýrnar vóru savnaðar saman aðru ferðina, tá sat Mŏr´-dĕ-câi í kongsliðinum.

20 Esther hevði ikki *enn* sýnt

ættarfólk sítt ella fólk sítt; eins og Mŏr´-dĕ-caî hevði álagt henni: tí at Esther inti ábjóðingina hjá Mŏr´-dĕ-caî, líka sum tá ið hon varð ald upp hjá honum.

21 ¶ Í teimum døgum, meðan Mŏr´-dĕ-caî sat í kongsliðinum, vórðu tveir av kongsins kamarsharrum, Bĭg´-thăn og Tĕ´-rĕsj, av teimum sum varðaðu hurðina, vreiðir, og søktu at leggja hond á kongin Ă-hăs-vĕ´-rŭs.

22 Og tingið varð kunnigt fyri Mŏr´-dĕ-caî, sum segði Estheri drotning *tað;* og Esther vissaði kong *harum* í Mŏr´-dĕ-caî-s navni.

23 Og tá ið avhoyring varð hildin um málið, varð tað funnið útav; tí vórðu teir báðir hongdir á eitt træ: og tað varð skrivað í bók krýniknanna frammi fyri kongi.

KAPITUL 3

EFTIR hesar lutir frammaði Ă-hăs-vĕ´-rŭs kongur Há´-măn, son Hăm-mĕ-dá´-thă Á´-gă-gĭt´-a, og framflutti hann, og setti hansara sæti uppum allar prinsarnar sum *vóru* hjá honum.

2 Og allir kongsins tænarar, sum *vóru* í kongsliðinum, lútaðu, og virðingaróttaðust Há´-măn: tí at kongur hevði soleiðis áboðið viðvíkjandi honum. Men Mŏr´-dĕ-caî lútaði ikki, ella inti *honum* virðingarótta.

3 Tá søgdu kongsins tænarar, sum í *vóru* kongsliðinum, við Mŏr´-dĕ-caî, Hví brýturt tú áboðið hjá kongi?

4 Nú, tað bar á, tá ið teir talaðu dagliga við hann, og hann lýddi ikki á teir, at teir taldu Há´-măn-i, *fyri* at síggja hvørt málˇ Mŏr´-dĕ-caî-s vildu standast: tí at hann hevði sagt teimum, at hann *var* Jødi.

5 Og tá ið Há´-măn sá, at Mŏr´-dĕ-caî lútaði ikki, ella inti honum virðingarótta, tá varð Há´-măn fullur av vreiði.

6 Og honum tókti háð at leggja hendur á Mŏr´-dĕ-caî aleina; tí at teir høvdu sýnt honum fólk Mŏr´-dĕ-caî-s: hvørsvegna Há´-man royndi at oyða allar Jødarnar sum *vóru* út gjøgnum alt kongadømi Ă-hăs-vĕ´-rŭs-ar, *enntá* fólk Mŏr´-dĕ-caî-s.

7 ¶ Í tí fyrsta mánaðinum, tað *er* mánaðinum Nī´-săn, í hinum tólvta ári Ă-hăs-vĕ´-rŭs-ar kongs, kastaðu teir Pūr, tað *er* lutin, frammi fyri Há´-măn-i frá degi til dags, og frá mánaði til mánaðar, *til* hins tólvta *mánaðar,* tað *er* mánaðurin Ă´-dâr.

8 ¶ Og Há´-măn segði við Ă-hăs-vĕ´-rŭs kong, Tað er eitt ávíst fólk, spjatt útumkring og spreitt millum fólksins í øllum fylkjum kongadømis tíns; og teirra lógir *eru* ymsar frá øllum fólki; eiheldur halda teir lógir kongs: tí *er* tað ikki til kongsins gagn at tola teir.

9 Um tað hóvi kongi, latið tað verða skrivað, at teir mega verða oyddir: og eg vil gjalda tíggju túsund talentir av silvuri til hendur teirra sum hava áleggingina av gerninginum, at føra *tað* inn í dýrgripagoymslur kongs.

10 Og kongur tók ring sín frá hond síni, og gav hann at Há´-măn-i Hăm-mĕ-dá´-thă syni Á´-gă-gĭt´-a, figginda Jødanna.

11 Og kongur segði við Há´-măn, Silvurið *er* givið til tín, fólkið eisini, at gera við teir sum tað tykist gott fyri tær.

12 Tá vórðu skrivarar kongs kallaðir á hinum trettanda degi hins fyrsta mánaðar, og tað varð skrivað samsvarandi við alt sum Há´-măn hevði áboðið fylkisyvirmonnum kongs, og til landsstjóranna sum *vóru* yvir hvørjum fylki, og til stjórnaranna av hvørjum fólki av hvørjum fylki samsvarandi við skrift tess, og *til* hvørs fólks eftir tungumáli teirra; í navni Ă-hăs-vĕ´-rŭs-ar kongs varð

tað skrivað, og innsiglað við ringi kongs.

13 Og brøvini vórðu send við post*boð*um inn í øll fylkir kongs, at oyða, at drepa, og at elva at týnast, allar Jødar, bæði ungar og gamlar, lítil børn og kvinnur, í ēinum degi, *enntá* uppá hin trettanda *dag* hins tólvta mánaðar, sum *er* mánaðurin Ā́-dâr, og *at taka* fongin av teimum til eina bráð.

14 Avritið av skrivinum til eina ábjóðan at verða givið í hvørjum fylki varð kunngjørt øllum fólki, at tey skuldu vera tilreiðar ímóti tí degi.

15 Post*boð*ini fóru út, verðandi skundaðir við ábjóðan kongs, og løgskipanin varð givin í Sjū́-sjān slottinum. Og kongur og Há́-mān settust niður at drekka; men staðurin Sjū́-sjān var í villareiði.

KAPITUL 4

TÁ ið Mōŕ-dē-câi varnaðist alt sum var gjørt, skræddi Mōŕ-dē-câi klæðir síni, og fór í sekkjaklæði við øskum, og fór út í miðjan staðin, og rópaði við einum hørðum og beiskum rópi;

2 Og kom enntá framfyri kongsliðið: tí at eingin *mátti* innfarið inn í kongsliðið, klæddur við sekkjaklæði.

3 Og í hvørjum fylki, hvagarsumhelst *ið* áboðið hjá kongi og hansara løgskipan komu, *har var* mikil harman Jødanna millum, og føsta, og grátur, og venan; og mangir lógu í sekkjaklæði og øskum.

4 ¶ So moyggjarnar hjá Estheri og hennara kamarsharrar komu og taldu henni *tað*. Tá varð drotningin avbera hørm; og hon sendi klæði til at klæða Mōŕ-dē-câi, og til at taka burt hansara sekkjaklæði frá honum: men hann tók ikki ímóti *tí*.

5 Tá rópaði Esther Há́-tăch, *ēin* av kamarsharrum kongs, hvønn hann hevði útnevnt at varta um hana, og gav honum eina ábjóðan til Mōŕ-dē-câi-s, at vita hvat tað *var*, og hví tað *var*.

6 So Há́-tăch fór fram til Mōŕ-dē-câi-s at stræti staðarins, sum *var* frammanfyri kongsliðið.

7 Og Mōŕ-dē-câi taldi honum um alt sum hevði hent hann, og um penings-upphæddina sum Há́-mān hevði lovað at gjalda til dýrgripagoymslur kongs fyri Jødarnar, at oyða teir.

8 Eisini gav hann honum avritið av løgboðsskrivinum, sum varð givið í Sjū́-sjān *um* at oyða teir, at sýna Estheri *tað*, og at klárleggja henni *tað*, og at áleggja henni, at hon skuldi fara inn at kongi, at gera umbøning at honum, og at gera fyrispurning frammi fyri honum fyri fólk sítt.

9 Og Há́-tăch kom og segði Estheri orðini hjá Mōŕ-dē-câi-i.

10 ¶ Aftur talaði Esther við Há́-tăch, og gav honum áboð at Mōŕ-dē-câi-i;

11 Allir kongsins tænarar, og fólkið av fylkjum kongs, vita, at hvørsumhelst, hvørt maður ella kvinna, *ið* skal koma at kongi inn í hin innara forgarð, sum er ikki kallaður, *tað er* ēin lóg hjá honum at taka *hann* av lívi, uttan slík, til hvørs kongur skal halda út hin gylta sprota, at hann má liva: men eg havi ei verðið kallað at koma inn at kongi hesar tríati dagar.

12 Og teir taldu Mōŕ-dē-câi-i orðini hjá Estheri.

13 Tá ábjóðaði Mōŕ-dē-câi at svara Estheri, Hugsa ikki við tær sjálvari, at tú skalt komast undan í húsi kongs, meir enn allir Jødarnir.

14 Tí at um tú aldeilis heldurt friði tínum á hesi tíð, *tá* skulu umvaksan og útfrían reisast hjá Jødunum frá einum øðrum plássi; men tú og hús faðirs tíns skulu

verða oydd: og hvør veit, hvørt tú ert komin til kongadømisins fyri eina *slíka* tíð sum hesa?

15 ¶ Tá beyð Esther *teimum at* bera aftur Mǒr´-dě-cāi-i *hetta svar,*

16 Far, savna saman allar Jødarnar sum eru tilstaðar í Sjū´-sjān, og fastið tit fyri mær, og hvørki etið ella drekkið *í* tríggjar dagar, nátt ella dag: eg eisini og moyggjar mínar vilja fasta líkaleiðis; og so vil eg fara inn at kongi, sum *er* ikki samsvarandi við lógina: og um eg farist, *so* farist eg.

17 So Mǒr´-dě-cāi fór sín veg, og gjørdi samsvarandi við alt sum Esther hevði boðið honum.

KAPITUL 5

NÚ, tað bar á í tí triðja deginum, at Esther fór í *sítt* kongliga *skart,* og stóð í tí innara forgarðinum av kongshúsinum, yvir av kongshúsinum: og kongur sat uppiá sínum kongliga hásæti í tí kongliga húsinum, yvir av liði hússins.

2 Og tað varð so, tá ið kongur sá Esther drotning standandi í forgarðinum, *at* hon vann yndi í eygsjón hansara: og kongur helt út mót Estheri hin gylta sprota sum *var* í hond hans. So Esther nærkaðist, og nart við toppin á sprotanum.

3 Tá segði kongur við hana, Hvat vilt tú, Esther drotning? og hvør *er* tín fyrispurningur? tað skal verða enntá givið tær til helmingin av kongadøminum.

4 Og Esther svaraði, Um *tað tyki* kongi gott, lat kong og Há´-măn koma henda dag at veitsluborðhaldinum sum eg havi tilbúgvið til hansara.

5 Tá segði kongur, Fáið Há´-măn at gera skjótt, at hann má gera eins og Esther hevur sagt. So kongur og Há´-măn komu til veitsluborðhaldið sum Esther hevði búgvið til.

6 ¶ Og kongur segði við Esther við vín-veitsluborðhaldið, Hvør *er* umbøn tín? og tað skal verða veitt tær: og hvør *er* tín fyrispurningur? enntá til helmingin av kongadøminum skal tað verða útint.

7 Tá svaraði Esther, og segði, Mín umbøn og mín fyrispurningur *er;*

8 Um eg havi funnið tokka í eygsjónini á kongi, og um tað hóvi kongi at veita mína umbøn, og at fremja fyrispurning mín, lat kong og Há´-măn koma til festmáltíðina sum eg skal tilbúgva til teirra, og eg vil gera í morgin eins og kongur hevur sagt.

9 ¶ Tá fór Há´-măn fram tann dagin frødligur og við einum glaðum hjarta: men tá ið Há´-măn sá Mǒr´-dě-cāi í kongsliðinum, at hann stóð ikki upp, ella flutti *seg* fyri honum, varð hann fullur av harmavreiði ímóti Mǒr´-dě-cāi.

10 Hóast hetta, Há´-măn helt sær: og tá ið hann kom heim, sendi hann og rópaði vinir sínar, og Zĕ´-rĕsj, konu sína.

11 Og Há´-măn segði teimum um dýrdina av ríkidømum sínum, og fjøldleikan av børnum sínum, og øll *tey tingini,* hvarí kongur hevði frammað hann, og hvussu hann hevði uppflutt hann uppum prinsar og tænarar kongsins.

12 Há´-măn segði harafturat, Ja, Esther drotning læt ongan mann koma inn við kongi at veitsluborðhaldinum sum hon hevði tilbúgvið, uttan meg sjálvan; og í morgin eri eg boðin til hennara eisini við kongi.

13 Tó gagnar alt hetta mær einkið, so leingi sum eg síggi Mǒr´-dě-cāi Jøda sitandi við kongsliðið.

14 ¶ Tá søgdu Zĕ´-rĕsj — kona hansara, og allir vinir hansara við hann, Lat ein gálga verða gjørdan á fimti alnir høgan, og í morgin tali tú við kong, at Mǒr´-dě-cāi

má verða hongdur hará: síðan fari tú inn gleimligani við kongi til veitslumáltíðina. Og tað tingið hóvaði Há´-măn; og hann voldi gálgan at verða gjørdan.

KAPITUL 6

ÁTEIRRI nátt fekk ikki kongur sovið, og hann ábjóðaði at koma við bókini av skrásetingum krýniknanna; og tær vórðu lisnar frammi fyri kongi.

2 Og tað varð funnið skrivað, at Mŏr´-dĕ-caî hevði sagt frá um Bĭg´-thâ-nă og Tĕ´-rĕsj, tveir av kamarsharrum kongs, vørðir hurðarinnar, sum søktu at leggja hond á kongin Ă-hăs-vĕ´-rūs.

3 Og kongur segði, Hvør heiður og tign hevur verðið gjørt við Mŏr´-dĕ-caî fyri hetta? Tá søgdu kongsins tænarar sum tæntu at honum, Tað er einkið gjørt fyri hann.

4 ¶ Og kongur segði, Hvør *er* í forgarðinum? Nú, Há´-măn var komin inn í hin útvortis forgarð av kongshúsinum, at tala við kong *um* at hanga Mŏr´-dĕ-caî á gálgan sum hann hevði fyribúgvið til hansara.

5 Og kongsins tænarar søgdu við hann, Sí, Há´-măn stendur í forgarðinum. Og kongur segði, Latið hann koma inn.

6 So Há´-măn kom inn. Og kongur segði við hann, Hvat skal verða gjørt tí manni, hvønn konginum fragdast at heiðra? Nú, Há´-măn hugsaði í hjarta sínum, Móti hvørjum vildi kongi fragdast at inna heiður, meiri enn móti mær sjálvum?

7 Og Há´-măn svaraði kongi, Fyri tí manni, hvønn kongi fragdast at heiðra,

8 Lat hitt kongliga skart verða komið við, sum kongur *plagar* at vera í; og rossið, sum kongur ríður uppiá; og hin kongliga krúna, sum sett verður uppá høvur hans:

9 Og lat hetta skart og ross verða latið til handar eins hinna mest tignarligu prinsa kongs, at teir mega uppskrýða tann mann *við øllum,* hvønn kongi fragdast at heiðra, og førið hann á hestbak gjøgn gøtu staðarins, og yvirlýsið frammanfyri honum, Svá skal tað verða gjørt við tann mann, hvønn kongi fragdast at heiðra.

10 Tá segði kongur til Há´-măn-s, Ger skjótt, *og* tak skartið og rossið, eins og tú hevurt sagt, og ger enntá soleiðis við Mŏr´-dĕ-caî Jøda, sum situr við kongsliðið: lat einkið svitast av øllum sum tú hevurt talað.

11 Tá tók Há´-măn skartið og rossið, og uppskrýddi Mŏr´-dĕ-caî, og førdi hann á hestbak gjøgn gøtu staðarins, og yvirlýsti frammanfyri honum, Svá skal tað verða gjørt tí manni, hvønn kongi fragdast at heiðra.

12 ¶ Og Mŏr´-dĕ-caî kom aftur til kongsliðið. Men Há´-măn skundaði til húss síns harmandi, og havandi høvur sítt dekkað.

13 Og Há´-măn segði Zĕ´-rĕsj-i – konu síni, og øllum vinum sínum hvørt *ting* sum hevði viðfarist honum. Tá søgdu hansara vísmenn og Zĕ´-rĕsj – kona hansara, við hann, Um Mŏr´-dĕ-caî *veri* av sáði Jødanna, frammi fyri hvørjum tú ert byrjaður at falla, skalt tú ei hava yvirvág ímóti honum, men skalt vissuliga falla frammi fyri honum.

14 Og meðan tey enn talaðu við hann, komu kongsins kamarsharrar, og skundaðu *sær* at føra Há´-măn at veitsluborðhaldinum sum Esther hevði búgvið til.

KAPITUL 7

SO kongur og Há´-măn komu til veitsluborðhalds við Esther drotning.

2 Og kongur segði aftur við Esther á øðrum deginum við

vín-veitsluborðhaldið, Hvør *er* umbøn tín, Esther drotning? og tað skal verða veitt tær: og hvør *er* tín fyrispurningur? og tað skal verða útint, *enntá* til helmingin av kongadøminum.

3 Tá svaraði Esther drotning og segði, Um eg havi funnið tokka í eygsjón tíni, O kongur, og um tað hóvi kongi, lat mítt lív verða givið mær við umbøn mína, og mítt fólk við fyrispurning mín:

4 Tí at vit eru seld, eg og fólk mítt, til at verða oydd, at verða vigin, og at týnast. Men um vit høvdu verðið seld sum trælmenn og trælkvinnur, hevði eg hildið tungu míni, hóast figgindin kundi ikki mótlíknað skaða kongsins.

5 ¶ Tá svaraði Á-hăs-vē´-rūs kongur og segði við Esther drotning, Hvør er hann, og hvar er hann, sum torir *at* ætla í hjarta sínum so at gera?

6 Og Esther segði, Mótstandarin og figgindin *er* hesin vondi Há´-măn. Tá varð Há´-măn ræddur frammi fyri kongi og drotningini.

7 ¶ Og kongur, rísandi frá vín-veitsluborðhaldinum, í síni vreiði *fór* inn í slotts-urtagarðin: og Há´-măn stóð upp at gera fyrispurning fyri sítt lív til Estherar drotning; tí at hann sá, at ilt var avrátt ímóti honum av kongi.

8 Tá vendi kongur aftur út úr slotts-urtagarðinum inn í plássið av vín-veitsluborðhaldinum; og Há´-măn var dottin uppá songina, hvará Esther *var*. Tá segði kongur, Vil hann noyða drotningina eisini frammi fyri mær í húsinum? Sum orðið fór út úr munni kongsins, dekkaðu teir andlit Há´-măn-s.

9 Og Hâr-bō´-năh, ēin av kamarsharrunum, segði frammi fyri kongi, Sí eisini, gálgin fimti alnir høgur, sum Há´-măn hevði gjørt til Mŏr´-dĕ-cāî-s, sum hevði talað gott fyri kong, stendur í húsi Há´-măn-s. Tá segði kongur, Hangið hann hará.

10 So teir hongdu Há´-măn á gálgan sum hann hevði fyribúgvið til Mŏr´-dĕ-cāî-s. Tá varð kongsins vreiði sissað.

KAPITUL 8

Á TÍ degi gav kongurin Ă-hăs-vē´-rūs hús Há-man-s, fígginda Jødanna, innat Estheri drotning. Og Mŏr´-dĕ-cāî kom framfyri kong; tí at Esther hevði sagt hvat hann *var* henni.

2 Og kongur tók av ring sín, sum hann hevði tikið frá Há´-măn-i, og gav Mŏr´-dĕ-cāî-i hann. Og Esther setti Mŏr´-dĕ-cāî yvir hús Há´-măn-s.

3 ¶ Og Esther talaði uppaftur frammi fyri kongi, og fell niður við føtur hansara, og bønaði hann við tárum *um* at beina burtur mein Há´-măn-s Á-gă-gīt´-a, og hansara snildarráð sum hann hevði upphugsað ímóti Jødunum.

4 Tá helt kongur út hin gylta sprota ímóti Estheri. So Esther reistist, og stóð frammi fyri kongi,

5 Og segði, Um tað hóvi kongi, og um eg havi funnið yndi í eygsjón hans, og tað tingið *tyki* rætt fyri kongi, og eg *veri meg* toknandi í eygum hans, lat tað verða skrivað til *tess* at viðsnúgva brøvunum *sum eru* upphugsað av Há´-măn-i Hăm-mĕ-dā´-thă syni Á-gă-gīt´-a, sum hann skrivaði til at oyða Jødarnar sum *eru* í øllum fylkjum kongsins:

6 Tí at hvussu kann eg halda út at síggja tað illa sum skal koma at fólki mínum? ella hvussu kann eg halda út at síggja oyðingina av ættarfólki mínum?

7 ¶ Tá segði Ă-hăs-vē´-rūs kongur við Esther drotning og til Mŏr´-dĕ-cāî-s Jøda, Sí, eg havi givið Estheri hús Há´-măn-s, og hann hava teir hongt uppá gálgan, av tí

at hann legði sína hond uppá Jødarnar.

8 Skrivið tit eisini fyri Jødarnar, eins og tað líkar tykkum, í navni kongsins, og innsiglið *tað* við ringi kongsins: tí at skriftina sum er skrivað í navni kongsins, og innsiglað við ringi kongsins, kann eingin maður viðsnúgva.

9 Tá vórðu skrivarar kongsins kallaðir á teirri tíðini í tí triðja mánaðinum, tað *er* mánaðinum Sĭ´-văn, á hinum trý og tjúgunda *degi* hans; og tað varð skrivað samsvarandi við alt sum Mŏr´-dĕ-cāĭ ábjóðaði Jødunum, og til fylkisyvirmannanna, og fulltrúanna og stjórnaranna av fylkjunum sum *eru* frá Indiu *enntá* at Ē-thĭ-ō´-pĭ-u, eitt hundrað *og* tjúgu og sjey fylkir, at hvørjum fylki samsvarandi við skrift tess, og at hvørjum fólki eftir tungumáli teirra, og til Jødanna samsvarandi við skrift teirra, og samsvarandi við tungumál teirra.

10 Og hann skrivaði í kongsins Ă-hăs-vē´-rŭs-ar navni, og innsiglaði *tað* við ringi kongsins, og sendi brøv viðˆ post*boð*um á hestbaki, *og* reiðmonnum á múldjórum, kamelum, *og* ungum dromedărum:

11 Í hvørjum kongur veitti Jødunum, sum *vóru* í hvørjum staði, at savna seg saman, og at standa fyri lívi sínum, at oyða, at vega, og at elva at týnast, allan máttin hjá fólkinum og fylkinum sum vildi herja á tey, *bæði* smá og kvinnur, og *at taka* fongin av teimum til eina bráð,

12 Uppá ēin dag í øllum fylkjum Ă-hăs-vē´-rŭs-ar kongs, *nevniliga*, uppá hin trettanda *dag* av tí tólvta mánaðinum, sum *er* mánaðurin Ă´-dâr.

13 Avritið av skrivinum til eina ábjóðan, at verða givið í hvørjum fylki, *varð* kunngjørt øllum fólki, og at Jødarnir skuldu vera tilreiðar ímóti tí degi at hevna seg á fíggindar sínar.

14 *So* post*boð*ini, sum riðu uppiá múldjórum *og* kamelum, fóru út, verðandi skundaðir og trýstir áfram av áboði kongsins. Og løgskipanin varð givin í Sjū´-sjăn slottinum.

15 ¶ Og Mŏr´-dĕ-cāĭ fór út frá nærveru kongsins í kongligum skarti av bláum og hvítum, og við eini miklari krúnu av gulli, og við einum klæði av fínum líni og purpuri: og staður Sjū´-sjăn-s fegnaðist og var glaður.

16 Jødarnir høvdu ljós, og gleði, og frøi, og heiður.

17 Og í hvørjum fylki, og í hvørjum staði, hvagarsumhelst *ið* áboðið hjá kongi og hansara løgskipan kom, høvdu Jødarnir frøi og gleði, eina veitslu og ein góðan dag. Og mangir av fólki landsins gjørdust Jødar; tí at óttin fyri Jødunum fell uppá teir.

KAPITUL 9

NÚ, í tí tólvta mánaðinum, tað *er* mánaðinum Ă´-dâr, á tí trettanda deginum av hinum sama, tá ið áboðið hjá kongi og hansara løgskipan nærkaðust at verða sett í verk, á tí degi sum fíggindar Jødanna vónaðu at hava mátt yvir teimum, (tó *at* tað varð vent til hins øvugta, at Jødarnir høvdu stjórn yvir teimum sum hataðu teir;)

2 Savnaðu Jødarnir seg saman í staðum sínum út gjøgnum øll fylkir Ă-hăs-vē´-rŭs-ar kongs, at leggja hond á slíkar sum søktu teirra mein: og eingin maður kundi standa ímóti teimum; tí at óttin fyri teimum fell uppá alt fólk.

3 Og allir stjórnararnir av fylkjunum, og fylkisyvirmenninir, og fulltrúarnir, og yvirmenn*inir* hjá kongi, hjálptu Jødunum; av tí at óttin fyri Mŏr´-dĕ-cāĭ fell uppá teir.

4 Tí at Mŏr´-dĕ-cāĭ *var* mikil í

húsi kongsins, og hansara giti fór út gjøgnum øll fylkini: tí at hesin maðurin Mŏr´-dĕ-cāî vaks miklari og miklari.

5 Soleiðis slógu Jødarnir allar sínar figgindar við slagi svørðsins, og slátran, og oyðing, og gjørdu hvat teir vildu at teimum ið hataðu teir.

6 Og í Sjū´-sjän slottinum vógu Jødarnir og oyddu fimm hundrað menn.

7 Og Pâr-sjän-dá´-thă, og Dăl´-phŏn, og Ăs-pá´-thă,

8 Og Pŏr-á´-thă, og Ă-dá´-lĭ-ă, og Ăr-ĭ-dá´-thă,

9 Og Pâr-măsj´-tă, og Ăr´-ĭ-sâî, Ăr´-ĭ-dâî, og Vă-jĕz´-ă-thă,

10 Teir tíggju synirnar hjá Há´-măn Hăm-mĕ-dá´-thă syni, fíggjinda Jødanna, vógu teir; men á fongin løgdu teir ikki hond sína.

11 Á tí degi varð talið á teimum, sum vórðu vignir í Sjū´-sjän slottinum, ført framfyri kong.

12 ¶ Og kongur segði við Esther drotning, Jødarnir hava vigið og oytt fimm hundrað menn í Sjū´-sjän slottinum, og teir tíggju synirnar hjá Há´-măn-i; hvat hava teir gjørt í restini av fylkjum kongsins? nú, hvør *er* umbøn tín? og tað skal verða veitt tær: ella hvør *er* tín fyrispurningur víðari? og tað skal verða gjørt.

13 Tá segði Esther, Um tað hóvi kongi, lat tað verða veitt til Jødanna, sum *eru* í Sjū´-sjän, at gera í morgin eisini sambært løgskipan hesa dags, og lat Há´-măn-s tíggju synir verða hongdar uppá gálgan.

14 Og kongur ábjóðaði tað soleiðis at verða gjørt: og løgskipanin varð givin í Sjū´-sjän; og teir hongdu Há´-măn-s tíggju synir.

15 Tí at Jødarnir, sum *vóru* í Sjū´-sjän, savnaðu seg saman á tí fjúrtanda deginum eisini av mánaðinum Ă´-dâr, og vógu trý hundrað menn í Sjū´-sjän; men á fongin løgdu teir ikki hond sína.

16 Men hīnir Jødarnir, sum *vóru* í fylkjum kongsins, savnaðu seg saman, og stóðu fyri lívum sínum, og høvdu hvílu frá fíggindum sínum, og vógu av sínum fíggindum sjeyti og fimm túsund, men teir løgdu ikki hendur sínar á fongin,

17 Á tí trettanda deginum av mánaðinum Ă´-dâr; og á tí fjúrtanda deginum av hinum sama, hvíldu teir, og gjørdu hann *til* ein dag av veitslan og gleði.

18 Men Jødarnir, sum *vóru* í Sjū´-sjän, savnaðu *seg* saman á hinum trettanda *degi* hans, og á hinum fjúrtanda hans; og á hinum fimtanda *degi* av hinum sama hvíldu teir, og gjørdu hann *til* ein dag av veitslan og gleði.

19 Jødarnir úr bygdunum, sum búðu í teimum ómúraðu býunum, tessvegna gjørdu hin fjúrtanda dagin av mánaðinum Ă´-dâr *til ein dag av* gleði og veitslan, og ein góðan dag, og av at senda skamtir hvør til annars.

20 ¶ Og Mŏr´-dĕ-cāî skrivaði hesi tingini, og sendi brøv at øllum Jødunum sum *vóru* í øllum fylkjum kongsins Ă-hās-vē´-rūs-ar, *bæði* nær og fjar,

21 At stovnseta *hetta* sín ámillum, at teir skuldu halda hin fjúrtanda dagin av mánaðinum Ă´-dâr, og hin fimtanda dagin av hinum sama, árliga,

22 Eins og dagarnir, í hvørjum Jødarnir hvíldu frá sínum fíggindum, og mánaðurin sum varð vendur teimum frá sorg til frøi, og frá venan yvirí ein góðan dag: at teir skuldu gera sær dagar av veitslan og frøi, og av at senda skamtir hvør til annars, og gávur til hinna fátæku.

23 Og Jødarnir fóru undir at gera eins og teir vóru byrjaðir, og eins og Mŏr´-dĕ-cāî hevði skrivað teimum;

24 Av tí at Há´-măn Hăm-mĕ-dá´-thă sonur, Á-gă-gīt´-in, fíggindin

av øllum Jødunum, hevði upphugsað ímóti Jødunum at oyða teir, og hevði kastað Pūr, tað *er* lutin, til at upptæra teir, og at oyða teir;

25 Men tá ið *Esther* kom framfyri kong, bjóðaði hann við brøvum, at hansara vonda páfund, sum hann upphugsaði ímóti Jødunum, skuldi venda aftur uppá hans egna høvd, og at hann og hansara synir skuldu verða hongdir á gálganum.

26 Hvørsvegna teir kallaðu hesar dagarnar Pū́-rīm eftir navni Pūr-s. Tessvegna fyri øll orðini av hesum brævi, og *av tí* sum teir høvdu sæð viðvíkjandi hesum máli, og sum var komið at teimum,

27 Fyriskipaðu Jødarnir, og tóku uppá seg, og uppá sáð sítt, og uppá allar slíkar sum sameintu seg sjálvar at teimum, so at tað skuldi ikki svitast, at teir vildu halda hesar tveir dagarnar samsvarandi við skrift teirra, og samsvarandi við teirra *ásettu* tíð hvørt ár;

28 Og *at* hesir dagarnir *skuldu verða* mintir og hildnir út gjøgnum hvørja ætt, hvørja familju, hvørt fylki, og hvønn stað; og *at* hesir dagarnir av Pū́-rīm skuldu ikki svitast Jødanna millum ífrá, ella minnið um teir farast frá teirra sáði.

29 Tá skrivaðu Esther drotning, dóttir Á-bī-hâîl-s, og Mōr´-dě-câî Jødi, við øllum myndugleika, til at staðfesta hetta annað brævi Pū́-rīm-s.

30 Og hann sendi brøvini at øllum Jødunum, til tey hundrað *og* tjúgu og sjey fylkini av kongadømi Ă-hăs-vē´-rŭs-ar, *við* orðum av friði og sannleika,

31 Til at staðfesta hesar dagarnar av Pū́-rīm í teirra *ásettu* tíðum, samsvarandi sum Mōr´-dě-câî Jødi og Esther drotning høvdu álagt teimum, og sum teir høvdu løgskipað fyri seg sjálvar og fyri sáð sítt, málevnini av føstunum og rópi sínum.

32 Og løgskipanin hjá Estheri staðfesti hesi málevnir Pū́-rīm-s; og tað varð skrivað í bókina.

KAPITUL 10

OG Ă-hăs-vē´-rŭs kongur legði eitt íkast uppá landið, og *uppá* oyggjar havsins.

2 Og allir gerningarnir av hansara makt og av hansara veldi, og kunngeringin av mikilleika Mōr´-dě-câî-s, hvarat kongur framflutti hann, *eru* teir ikki skrivaðir í bók krýnikna konganna av Mē´-dī-ŭ og Persiu?

3 Tí at Mōr´-dě-câî Jødi *var* næstur Ă-hăs-vē´-rŭs-i kongi, og mikil Jødanna millum, og góðkendur av fjøldini av brøðrum sínum, søkjandi ríksemi fólks síns, og talandi frið til alt sítt sáð.

JOBS BÓK.

KAPITUL 1

TAÐ var ein maður í Ŭz landi, hvørs navn *var* Job; og tann maðurin var fullkomin og rættiligur, og ēin sum óttaðist Guð, og skýggjaði ilt.

2 Og tað vórðu fødd honum sjey synir og tríggjar døtur.

3 Hansara *figgjar*evni eisini var sjey túsund seyðir, og trý túsund kamelar, og fimm hundrað ok av oksum, og fimm hundrað øsnur, og eitt sera mikið húshald; so at hesin maður var hin mætasti av øllum monnum eystursins.

4 Og hansara synir fóru og veitslaðust *í* húsum *sínum,* hvør

og ēin dag sín; og sendu og rópaðu sínar tríggjar systrar at eta og at drekka við sær.

5 Og tað varð so, tá ið dagarnir av *teirra* veitslan vóru umgingnir, at Job sendi og halgaði teir, og reis upp árla um morgunin, og ofraði brennioffur *samsvarandi* við talið á teim øllum: tí at Job segði, Tað kann vera, at synir mínir hava syndað, og bannað Guð í hjørtum sínum. Soleiðis gjørdi Job støðugt.

6 ¶ Nú, tað var ein dagur tá ið synir Guðs komu at framseta seg sjálvar framfyri HARRAN, og Satan kom eisini teirra millum.

7 Og HARRIN segði við Satan, Hvaðan kemurt tú? Satan tá svaraði HARRANUM, og segði, Frá at fara til og frá á jørðini, og frá at ganga niðan og oman á henni.

8 Og HARRIN segði við Satan, Hevurt tú umhugsað tænara mín Job, at *tað er* eingin líka *sum* hann á jørðini, ein fullkomin og ein reiðiligur maður, ēin sum óttast Guð, og skýggjar ilt?

9 Satan tá svaraði HARRANUM, og segði, Óttast Job Guð fyri einkið?

10 Hevurt ikki tú gjørt eina girðing um hann, og kring hús hansara, og kring alt sum hann hevur á hvørjari síðu? tú hevurt vælsignað verkið av hondum hansara, og hansara *figgjar*evni er økt í landinum.

11 Men set fram hond tína nú, og nem við alt sum hann hevur, og hann vil banna teg *upp* í andlit títt.

12 Og HARRIN segði við Satan, Sí, alt sum hann hevur *er* í mátti tínum; einans uppá sjálvan hann set ikki fram hond tína. So Satan fór út frá nærveru HARRANS.

13 ¶ Og tað var ein dagur, tá ið synir hansara og døtur hansara ótu og drukku vín í húsi elsta bróðurs síns:

14 Og tað kom ein sendiboði at Job, og segði, Oksarnir pløgdu, og asnarnir á biti við síðuna av teimum:

15 Og Sâ-bē´-ararnir fullu *uppá teir,* og tóku teir burtur; ja, teir hava vigið tænararnar við svørðseggini; og eg einans eri komin undan einsamallur at siga tær frá.

16 Meðan hann enn talaði, kom tað eisini ein annar, og segði, Eldur Guðs er fallin frá himni, og hevur brent upp seyðin, og tænararnar, og upptært teir; og eg einans eri komin undan einsamallur at siga tær frá.

17 Meðan hann enn talaði, kom tað eisini ein annar, og segði, Chăl-dē´-ararnir útgjørdu trý lið, og fullu uppá kamelarnar, og hava borið teir burtur, ja, og vigið tænararnar við svørðseggini; og eg einans eri komin undan einsamallur at siga tær frá.

18 Meðan hann enn talaði, kom tað eisini ein annar, og segði, Synir tínir og døtur tínar ótu og drukku vín í húsi elsta bróðurs síns:

19 Og sí, tað kom ein mikil vindur frá oyðuni, og sló tey fýra hornini á húsinum, og tað fell uppá ungmennini, og tey eru deyð; og eg einans eri komin undan einsamallur at siga tær frá.

20 Tá reistist Job, og skræddi kappa sín, og rakaði høvur sítt, og fell niður uppá jørðina, og tilbað,

21 Og segði, Nakin kom eg út úr móðurlívi móður mínar, og nakin skal eg venda aftur hagar: HARRIN gav, og HARRIN hevur tikið burtur; vælsignað veri navn HARRANS.

22 Í øllum hesum syndaði Job ikki, ella ákærdi Guð dársamligani.

KAPITUL 2

AFTUR var tað ein dagur tá ið synir Guðs komu at framseta seg sjálvar framfyri HARRAN, og Satan kom eisini teirra millum at framseta seg sjálvan framfyri HARRAN.

2 Og HARRIN segði við Satan, Hvaðan frá kemurt tú? Og Satan svaraði HARRANUM, og segði, Frá at fara til og frá á jørðini, og frá at ganga niðan og oman á henni.

3 Og HARRIN segði við Satan, Hevurt tú umhugsað tænara mín Job, at *tað er* eingin líka *sum* hann á jørðini, ein fullkomin og rættiligur maður, ēin sum óttast Guð, og skýggjar ilt? og enn heldur hann fast heilleika sínum, tó *at* tú rørdirt meg ímóti honum, at oyða hann uttan grund.

4 Og Satan svaraði HARRANUM, og segði, húð fyri húð; ja, alt, sum ein maður hevur, vil hann geva fyri lív sítt.

5 Men set fram hond tína nú, og nem við bein hansara og hold hansara, og hann vil banna teg *upp* í andlit títt.

6 Og HARRIN segði við Satan, Sí, hann *er* í hond tíni; men bjarga lívi hansara.

7 ¶ So fór Satan fram frá nærveru HARRANS, og sló Job við svárum svullum frá ilini á fóti hansara at krúnu hansara.

8 Og hann tók sær eitt pottabrot at skava sær við; og hann settist niður millum øskurnar.

9 ¶ Tá segði kona hansara við hann, Afturheldurt tú enn tín heilleika? banna Guð, og doyggj.

10 Men hann segði við hana, Tú talart sum ēin av teimum dársomu kvinnunum talar. Hvat? skulu vit taka við góðum av hond Guðs, og skulu vit ikki taka við illum? Í øllum hesum syndaði ikki Job við vørrum sínum.

11 ¶ Nú, tá ið *teir* tríggir vinirnir hjá Job hoyrdu um alt hetta illa sum var komið uppá hann, komu teir hvør *og* ēin frá sínum egna plássi; Ē´lĭ-phăz Tê-măn-ĭt´-i, og Bildad Sjū-hĭt´-i, og Zō´-phâr Ná-ăm-ă-thĭt´-i: tí at teir høvdu gjørt eina avtalu saman, at koma at harma við honum og at ugga hann.

12 Og tá ið teir lyftu upp eygum sínum langt burturifrá, og kendu hann ikki, lyftu teir upp rødd síni, og grótu; og teir skræddu hvør *og* ēin kappa sín, og slettu støv uppá síni høvur ímóti himni.

13 So teir settust niður við honum uppá jørðina sjey dagar og sjey nætur, og eingin talaði eitt orð við hann: tí at teir sóu, at *hansara* harmur var sera mikil.

KAPITUL 3

EFTIR hetta opnaði Job munn sín, og bannaði dag sín.

2 Og Job talaði, og segði,

3 Lat dagin glatast, í hvørjum eg varð føddur, og náttina, *í hvørji* tað varð sagt, Eitt mansbarn er alið fram.

4 Lat tann dag vera myrkur; lat ikki Guð geva far um hann frá í erva, eiheldur lat ljósið skína uppá hann.

5 Lat myrkur og skugga deyðans bletta hann; lat eitt skýggj búgva uppiá honum; lat svartleika dagsins *gera* hann ræðsluslignan.

6 *Hvat* teirri nátt *viðvíkur,* lat myrkur leggjast á hana; lat hana ei verða tengda at døgum ársins, lat hana ei koma inn í tal mánaðanna.

7 Sí, lat ta nátt vera ēinliga, lat onga frødliga rødd koma harí.

8 Lat teir banna hana sum banna dagin, sum eru tilreiðar at reisa upp harman sína.

9 Lat stjørnurnar av hennara hálvalýsi vera myrkar; lat hana leita eftir ljósi, men einkið *hava;* eiheldur lat hana síggja degning dagsins:

10 Av tí at hon lokaði ikki aftur
hurðar móðurlívs *móður* mínar,
ella krógvaði sorg fyri eygum
mínum.
11 Hví doyði eg ikki frá móður-
lívinum? *hví* gav eg *ikki* upp
andan, tá ið eg kom út úr kvið-
inum?
12 Hví komu knøini mær á
møti? ella hví bróstini sum eg
skuldi súgva?
13 Tí at nú skuldi eg havt ligið
stillur og verið kvirrur, eg skuldi
havt sovið: tá hevði eg verið við
hvílu,
14 Hjá kongum og ráðgevum
jarðarinnar, sum bygdu oyðin
pláss til sín sjálvs;
15 Ella hjá prinsum sum
høvdu gull, sum fyltu hús síni
við silvuri:
16 Ella sum ein fjald føðing
uttanfyri tíð hevði eg ikki verið;
eins og pinkubørn *sum* aldri sóu
ljós.
17 Har hinir vondu halda upp-
at *frá* at órógva; og har hinir móðu
veri við hvílu.
18 *Har* fangarnir hvíla tilsaman;
teir hoyra ei kúgarans rødd.
19 Hin lítli og mikli eru har;
og tænarin *er* fríur frá meistara
sínum.
20 Hvørsvegna er ljós givið til
hansara sum er í vesældómi, og
lív hinum beiska *í* sál;
21 Hvørjum leingist eftir deyða,
men hann *kemur* ikki; og grava
eftir honum meir enn eftir fjaldum
dýrgripum;
22 Sum fegnast framúrliga, *og*
eru glaðir, tá ið teir kunnu grøv-
ina finna?
23 *Hví er ljós givið* til ein mann,
hvørs vegur er fjaldur, og hvønn
Guð hevur byrgt inni?
24 Tí mín suffan kemur áðrenn
eg eti, og mínar ýlanir eru heltar
út líkasum vøtnini.
25 Tí at tað ting, sum eg stór-
liga óttaðist, er komið omanyvir
meg; og hatta, sum eg var ræddur
fyri, er komið at mær.
26 Eg var ikki í trygd, eiheld-
ur hevði eg hvíld, eiheldur var eg
kvirrur; tó kom trongd.

KAPITUL 4

TÁ svaraði Ē′-lĭ-phăz Tê-măn-
ĭt′-i og segði,
2 *Um* vit royna at samtala við teg,
vilt tú verða harmur? men hvør
kann halda sær aftur frá at tala?
3 Sí, tú hevurt leiðbeint mong-
um, og tú hevurt styrkt hinar
veiku hendur.
4 Tíni orð hava uppihildið
honum sum var fallandi; og tú
hevurt styrkt hini máttleysu knø.
5 Men nú er tað komið uppá
teg, og tú svinnurt; tað nemur við
teg, og tú ert órógvaður.
6 *Er* ikki *hetta* tín ótti, títt mót,
tín vón, og reiðiligleikin av tínum
vegum?
7 Minst til, eg biði teg, hvør
nakrantíð fórst, verandi sakleys-
ur? ella hvar vórðu hinir rættvísu
skornir av?
8 Júst sum eg havi sæð; teir
sum pløga misgerð, og sáa vond-
sku, heysta hitt sama.
9 Við Guðs blástri teir farast,
og við andablástrinum av hansara
nasum verða teir upptærdir.
10 Leyvunnar brølan, og røddin
hjá tí øgiligu leyvuni, og tenninar
hjá teimum ungu leyvunum, eru
brotnar.
11 Hin gamla leyvan ferst fyri
trot á bráði, og hvølparnir hjá
hini stinnu leyvu verða spjaddir
útum.
12 Nú, eitt ting varð loyniliga
ført til mín, og mítt oyra tók
ímóti eitt sindur av tí.
13 Í hugsanum frá sjónum
náttarinnar, tá ið djúpur svøvnur
fellur á menn,
14 Ótti kom uppá meg, og
nøtran, sum fekk øll míni bein
at skelva.

15 Tá fór ein andi frammanfyri
andliti mínum; hárið á mínum
holdi stóð upp:
16 Hann stóð stillur, men eg
kundi ei greina formin hará: ein
mynd *var* frammanfyri eygum
mínum, *har var* tøgn, og eg
hoyrdi eina rødd, *sigandi*,
17 Skal deyðiligur maður vera
meiri rættlátur enn Guð? skal
ein maður vera meiri skírur enn
skapari hansara?
18 Sí, hann legði einkið álit
á tænarar sínar; og sínar einglar
hann ákærdi fyri dárskap:
19 Hvør mikið minni *á* teir
sum búgva í húsum av leiri, hvørs
grundvøllur *er* í støvinum, *sum*
verða knúst frammi fyri mølinum?
20 Teir verða oyddir frá morg-
ni til kvølds: teir farast um ævir,
uttan at nakar gevur far um *tað*.
21 Fer ikki teirra avbærni, *sum*
í teimum *er,* burtur? teir doyggja,
sjálvt uttan vísdóm.

KAPITUL 5

KALLA nú, um tað veri *seg*
nakar sum vil svara tær;
og til hvørs av teimum heilagu
vilt tú venda *tær?*
2 Tí at vreiði drepur hin fá-
vitskuta mann, og øvund banar tí
fjákuta.
3 Eg havi sæð hin fávitskuta
sláandi rót: men eg brádliga bann-
aði hansara bústað.
4 Hansara børn eru langt frá
tryggleika, og tey verða knúst í
portrinum, eiheldur *er* nakar at
bjarga *teimum*.
5 Hvørs heyst hin svangi etur
upp, og tekur tað enntá úr torna-
*stik*unum, og ránsmaðurin svølg-
ir upp teirra *figgjar*evni.
6 Hóast nívd kemur ikki fram
úr dustinum, eiheldur sprettur
trongd burtur úr lendinum;
7 Tó verður maður føddur at
trongd, eins og neistarnir uppeft-
ir flúgva.
8 Eg vildi søkt innat Guði, og
innat Guði vildi eg litið mína søk:
9 Sum ger mikil og órannsaki-
lig ting; undranarverd ting uttan
tal:
10 Hvør gevur regn uppá jørð-
ina, og sendir vøtn uppá akrar-
nar:
11 At seta upp til hæddar teir
sum veri *seg* lágt; at teir, sum
harma, mega verða upphevjaðir
til tryggleika.
12 Hann snildarráðˇ hinna
snúigu skuffar, so at teirra hend-
ur kunnu ikki fremja *sítt* fyritak.
13 Hann tekur teir vísu í teirra
egnu snúinsemi: og ráð teirra
tvørlyntu verður borið *fram* eftir
fummum.
14 Teir hittast við myrkur um
dagsleitið, og trilva um middagin,
sum um náttina.
15 Men hann frelsir hin arma
frá svørðinum, frá teirra munni,
og frá hond hins mektiga.
16 So hin armi hevur vón, og
misgerð tippir sín munn.
17 Sí, glaður *er* tann maður,
hvønn Guð rættleiðir: vanvirð tí
ikki tú aging hins Almáttuga:
18 Tí at hann ger sár, og bind-
ur um: hann særir, og hansara
hendur gera heilt.
19 Hann skal bjarga tær í seks
trongdum: ja, í sjey einkið ilt skal
nema teg.
20 Hann í hungursneyð skal
endurloysa teg frá deyða: og í
kríggi frá mátti svørðsins.
21 Tú skalt vera fjaldur frá
tungunnar koyrli: eiheldur skalt
tú vera ræddur fyri oyðing, tá ið
hon kemur.
22 Eftir oyðing og hungursneyð
skalt tú flenna: eiheldur skalt tú
vera ræddur fyri villdjórum jarðar-
innar.
23 Tí at tú skalt vera í bandalagi
við steinar akursins: og akursins
villdjór skulu vera í friðstøðu við
teg.

24 Og tú skalt vita, at títt tabernakkul *skal vera* í friði; og tú skalt vitja tín bústað, og skalt ikki synda.
25 Tú skalt vita eisini, at títt sáð *skal verða* mikið, og títt avkom sum gras jarðarinnar.
26 Tú skalt koma til gravar *tínar* í einum fullum aldri, líka sum eitt bundi av korni kemur inn í tíð síni.
27 Sí hetta, vit hava útgrundað tað, soleiðis *er* tað; hoyr tað, og viti tú *tað* til títt góða.

KAPITUL 6

MEN Job svaraði og segði,
2 Á, at mín harmur varð grundiga vigaður, og mín skaðatilburður lagdur í vágskálirnar tilsaman!
3 Tí at nú vildi hann verið tyngri enn sandur havsins: míni orð tí eru svølgd upp.
4 Tí at ørvar hins Almáttuga *eru* innan í mær, eitrið harav drekkur upp anda mín: Guðs ræðslur stilla seg sjálvar í uppstilling ímóti mær.
5 Gneggjar villasnin, tá ið hann hevur gras? ella beljar oksin yvir fóðri sínum?
6 Kann tað, sum er smakkleyst, verða etið uttan salt? ella er *nakar* smakkur í tí hvíta av einum eggi?
7 Tey tingini, *sum* sál mín sýtti at nema við, *eru* sum mín sorgarfulli matur.
8 Á, at eg mátti havt mín fyrispurning; og at Guð vildi veitt *mær* tað ting sum mær leingist eftir!
9 Enntá at tað vildi toknað Guði at oyða meg; at hann vildi sloppið leysari síni hond, og skorið meg av!
10 Tá vildi eg enn havt uggan; ja, eg vildi hert meg sjálvan í sorg: lat hann ikki spara; tí at eg havi ikki loynt orðini hjá Hinum Heilaga.
11 Hvat *er* mín styrki, at eg skuldi vónað? og hvat *er* mín endi, at eg skuldi framlongt mítt lív?
12 *Er* mín styrki styrkin hjá steinum? ella *er* hold mítt av messing?
13 *Er* ikki hjálp mín í mær? og er vísdómur heilt rikin frá mær?
14 Mót honum sum er nívdur, várkunn *skuldi verðið sýnd* frá vini hansara; men hann yvirgevur ótta hins Almáttuga.
15 Mínir bróður hava handlað svikaliga sum ein áarløkur, *og* sum streymurin av áarløkum teir ferðast avstað;
16 Sum eru svartligir orsakað av ísinum, *og* hvarí kavin er fjaldur:
17 Ta tíð teir vaksa heitir, hvørva teir: tá ið tað er heitt, verða teir upptærdir út úr plássi sínum.
18 Rásirnar av teirra vegi eru vendar til viks; teir fara til einkiðs, og týnast.
19 Tropparnir úr Tẽ´-má hugdu, flokkarnir úr Sjẽ´-bá væntaðu eftir teimum.
20 Teir vórðu ørkymlaðir, av tí at teir høvdu vónað; teir komu hagar, og skammaðust.
21 Tí at nú eru tit einkið; tit síggja *mína* niðurkastan, og eru ræddir.
22 Segði eg, Berið til mín? ella, Gevið eitt endurgjald til mín av *figgjar*evni tykkara?
23 Ella, Útfriið meg frá fíggindans hond? ella, Endurloysið meg frá hond teirra mektigu?
24 Lærið meg, og eg vil halda tungu míni: og elvið mær at skilja, í hvørjum eg eri farin skeivur.
25 Hvør kraftfør røtt orð eru! men hvat formanar tykkara trætan?
26 Ímynda tit *tykkum* at formana orð˘, og talurnar av ẽinum sum er vónsprongdur, *sum eru* sum vindur?

27 Ja, tit yvirmanna hin faðirleysa, og tit grava *eina holu* til vin tykkara.
28 Nú tessvegna, verið nøgdir, hyggið uppá meg; tí at *tað er* eyðsýnt at tykkum, um eg lúgvi.
29 Vendið aftur, eg biði tykkum, lat tað ikki vera misgerð; ja, vendið aftur aftur, mín rættvísi *er* í tí.
30 Er misgerð í míni tungu? kann ikki mín smakkur greina spilt ting?

KAPITUL 7

ER ikki ein tilskilað tíð hjá manni uppiá jørð? *eru ikki* hansara dagar eisini líka *sum* dagarnir hjá einum leigusveini?
2 Sum ein tænari inniliga tráar skuggan, og sum ein leigusveinur væntar eftir *endurgjaldinum av* sínum arbeiði:
3 Soleiðis eri eg fingin at eiga mánaðir av fáfongd, og stríggisligar nætur eru ásettar til mín.
4 Tá ið eg leggist niður, sigi eg, Nær skal eg reisast, og náttin vera farin? og eg eri fullur av kastingum til og frá *fram*at degningi dagsins.
5 Mítt kjøt er klætt við ormum og dustbøklum; mín húð er brotin, og vamlislig vorðin.
6 Mínir dagar eru skjótari enn ein vevaraskjúttil, og verða brúktir uttan vón.
7 O minst til, at lív mítt *er* vindur: mítt eyga skal ei meira sjá gott.
8 Eygað hjá honum, sum hevur sæð meg, skal sjá meg ei *meir:* tíni eygu *eru* uppá meg, og eg *eri* ei.
9 *Eins og* skýggið verður upptært og hvørvur burtur: soleiðis hann, sum fer niður til grøvina, skal koma upp ei *meira*.
10 Hann skal venda aftur ei meira til hús sítt, eiheldur skal hansara pláss kenna hann meira.
11 Tí vil eg ikki halda aftur munni mínum; eg vil tala í angist anda míns; eg vil klaga í beiskleika sálar mínar.
12 *Eri* eg ein sjógvur, ella ein hvalur, at tú seturt eina vakt yvir meg?
13 Tá ið eg sigi, Mín song skal ugga meg, mín lega skal lætta *um* klagu mína;
14 Tá ræðirt tú meg við dreymum, og *gert* meg ræðsluslignan gjøgnum sjónir:
15 So at mín sál velur kvaling, *og* deyða heldur enn mítt lív.
16 Mær stendst við *tað;* eg vildi ikki livað alveg: lat meg vera, tí mínir dagar *eru* fáfongd.
17 Hvat *er* maður, at tú skuldirt stórgjørt hann? og at tú skuldirt sett títt hjarta uppá hann?
18 Og *at* tú skuldirt vitjað hann hvønn morgun, *og* roynt hann hvørja løtu?
19 Hvør leingi vilt tú ikki víkja frá mær; ella lata meg aleinan, til eg svølgi niður ráka mín?
20 Eg havi syndað; hvat skal eg gera at tær, O tú varðveitari av monnum? hví hevurt tú sett meg sum eitt *skot*mál ímóti tær, so at eg eri ein byrði fyri mær sjálvum?
21 Og hví náðart tú ikki brot mítt, og tekurt burt mína misgerð? tí at nú skal eg sova í støvinum; og tú skalt søkja meg um morgunin, men eg *skal* ikki *vera*.

KAPITUL 8

TÁ svaraði Bildad Sjū-hĭt´-i, og segði,
2 Hvør leingi vilt tú tala hesi *ting?* og *hvussu leingi skulu* orðini av tínum munni *vera sum* ein sterkur vindur?
3 Spillir Guð dóm? ella spillir hin Almáttugi rættvísi?
4 Um tíni børn havi syndað ímóti honum, og hann havi kastað tey burtur fyri teirra brot;
5 Um tú vildirt søkt innat Guði

í góðari tíð, og gjørt tína umbøning til hins Almáttuga;
6 Um tú *vart* skírur og reiðiligur; vissuliga nú vildi hann vaknað fyri teg, og gjørt bústaðin hjá tíni rættvísi framgangsríkan.
7 Tó *at* tín byrjan var lítil, tó skal tín seinni endi stórligani økjast.
8 Tí at fregna, eg biði teg, av hini fyrru øld, og fyrireika teg til útgrundingina av teirra fedrum:
9 (Tí at vit *eru bert av* gjárdegi*num,* og vita einkið, av tí at várir dagar uppiá jørð *eru* ein skuggi:)
10 Skulu ikki teir læra teg, *og* siga tær, og mæla orðum út úr hjarta sínum?
11 Kann sevið vaksa upp uttan mýri? kann størurin vaksa uttan vatn?
12 Meðan hann *er* enn í sínum grønleika, *og* ei skorin niður, følnar hann áðrenn nøkur *onnur* urt.
13 Soleiðis *eru* gøturnar hjá øllum sum gloyma Guð; og hyklarans vón skal glatast:
14 Hvørs vón skal verða skorin av, og hvørs álit *skal verða* eitt eiturkopps vev.
15 Hann skal lenast uppá sítt hús, men tað skal ikki standast: hann skal halda tí fast, men tað skal ikki vara *við*.
16 Hann *er* grønur frammanfyri sólini, og hansara grein skjýtur fram í hans urtagarði.
17 Hans røtur eru sveipaðar kring rúgvuna, *og* sær plássið av steinum.
18 Um hann oyði hann frá hansara plássi, tá skal *tað* avnokta hann, *sigandi,* Eg havi ikki sæð teg.
19 Sí, hetta *er* frøin av hansara vegi, og burtur úr jørðini skulu aðrir vaksa.
20 Sí, Guð vil ikki kasta burtur ein fullkomnan *mann,* eiheldur vil hann hjálpa illgerarunum:
21 Til hann fylli tín munn við látri, og tínar varrar við fagnan.
22 Teir, sum hata teg, skulu verða klæddir við skomm; og bústaður hinna vondu skal koma til einkiðs.

KAPITUL 9

TÁ svaraði Job og segði,
2 Eg veit, *at tað er* soleiðis av sonnum: men hvussu skuldi maður verðið rættlátur hjá Guði?
3 Um hann vilji trætast við hann, hann kann ikki svara honum ēitt av túsund.
4 *Hann er* vísur í hjarta, og mektigur í styrki: hvør hevur hert *seg* ímóti honum, og hevur framgingið?
5 Sum burtflytur fjøllini, og tey vita ikki av: sum hvølvir tey í síni øði.
6 Sum skakar jørðina úr sínum plássi, og hennara súlur nøtra.
7 Sum ábýður sólini, og hon rísur ei; og innsiglar stjørnurnar.
8 Sum einsamallur tenur út himnarnar, og treður uppiá aldum havsins.
9 Sum ger Ârc′-tū-rŭs, Ō′-rī-ŏn, og Plēi-ā′-dēs, og suðursins kømur.
10 Sum ger mikil ting, framum at finna útav; ja, og undur uttan tal.
11 Sí, hann fer um meg, og eg síggi *hann* ikki: hann fer áfram eisini, men eg varnist hann ikki.
12 Sí, hann tekur burtur, hvør kann forða honum? hvør vil siga við hann, Hvat gert tú?
13 *Um* Guð ei vilji draga aftur sína øði, hinir hástóru hjálparar undir hann húka.
14 Hvør mikið minni skal eg svara honum, *og* velja út míni orð *til at kjakast* við hann?
15 Hvørjum, tó *at* eg var rættvísur, *tó* vildi eg ikki svarað, *men* eg vildi gjørt umbøning til dómara míns.
16 Um eg hevði kallað, og hann

hevði svarað mær; *tó* vildi eg ikki trúð, at hann hevði givið gætur at rødd míni.
17 Tí hann brýtur meg við einum ódnarvindi, og margfaldar míni sár uttan grund.
18 Hann vil ikki loyva mær at draga mín andadrátt, men fyllir meg vil beiskleika.
19 Um *eg tali* um styrki, sí, *hann er* sterkur: og um um dóm, hvør skal seta mær eina tíð *til at verja søk?*
20 Um eg rættvísgeri meg sjálvan, mín egni munnur skal dómfella meg: *um eg sigi,* Eg *eri* fullkomin, tað skal eisini prógva meg spiltan.
21 *Hóast* eg *var* fullkomin, *tó* vildi eg ikki kent mína sál: eg vildi vanvirt mítt lív.
22 Hetta *er* ēitt *ting,* tí segði eg *tað,* Hann oyðir hin fullkomna og hin vonda.
23 Um koyrilin brádliga bani, vil hann læa eftir roynslu teirra sakleysu.
24 Jørðin verður givin inn í hondina á tí vonda: hann hylur andlitini hjá hennara dómarum; um ikki, hvar, *og* hvør *er* hann?
25 Nú eru mínir dagar fljótari enn eitt post*boð:* teir flýggja avstað, einkið gott teir síggja.
26 Teir eru farnir avstað sum hini fljótu skip: sum ørnin *sum* skundar til bráðina.
27 Um eg sigi, Eg vil gloyma mína klagu, eg vil lætta av míni tyngd, og ugga *meg:*
28 Eg eri ræddur fyri øllum mínum sorgum; eg veit, at tú vilt ikki halda meg sakleysan.
29 *Um* eg veri *meg* vondur, hví strevist eg tá til einkiðs?
30 Um eg tvái mær við snjóvatni, og geri mínar hendur barasta so reinar;
31 Tó skalt tú søkkja meg í díkið, og mínum egnu klæðum skal standast við meg.
32 Tí at *hann er* ikki ein maður, sum eg *eri, at* eg skuldi svarað honum, *og* vit skuldu komið saman í dómi.
33 Eiheldur er tað nakar avgerðarmaður ímilli okkum, *sum* mátti lagt sína hond uppá okkum báðar.
34 Lat hann taka sín stav burtur frá mær, og lat ikki hans ótta slá meg *við* rædslu:
35 *Tá* vildi eg talað, og ikki óttast hann; men *tað er* ikki soleiðis við mær.

KAPITUL 10

MÍN sál er móð av mínum lívi; eg vil eftirlata mína klagu uppiá mær sjálvum; eg vil tala í beiskleikanum av míni sál.
2 Eg vil siga við Guð, Fordøm meg ikki; sýn mær hvørsvegna tú stríðirst við meg.
3 *Er tað* gott hjá tær, at tú skuldirt kúgað, at tú skuldirt vanvirt verkið av hondum tínum, og skinið uppá ráðið hjá teimum vondu?
4 Hevurt tú eygu av kjøti? ella sært tú sum maður sær?
5 *Eru* tínir dagar sum dagarnir hjá manni? *eru* tíni ár sum dagar mans,
6 At tú fregnarst eftir míni misgerð, og sóknarst eftir míni synd?
7 Tú veitst, at eg eri ikki vondur; og *tað er* eingin, sum kann útfría út úr hond tíni.
8 Tínar hendur hava gjørt meg og snikkað meg saman runt umkring; tó oyðirt tú meg.
9 Minst til, eg bøni teg, at tú hevurt gjørt meg sum leirið; og vilt tú føra meg í støv aftur?
10 Hevurt tú ikki helt meg út sum mjólk, og storknað meg líka *sum* ost?
11 Tú hevurt klætt meg við húð og holdi, og hevurt girt meg við beinum og sinum.
12 Tú hevurt latið mær lív og

tokka, og tín vitjan hevur varðveitt mín anda.
13 Og hesi *ting* hevurt tú fjalt í hjarta tínum: eg veit, at hetta *er* hjá tær.
14 Um eg syndi, tá merkirt tú *tær* meg, og tú vilt ikki fríkenna meg frá míni misgerð.
15 Um eg veri *meg* vondur, vei mær, men *um* eg veri *meg* rættvísur, *tó* vil eg ikki lyfta upp høvur mítt. *Eg eri* fullur av ørkymlan; tí sjái tú mína nívd;
16 Tí hon tekur til. Tú veiðirt meg sum ein grimm leyva: og aftur sýnirt tú teg undranarverdan uppiá mær.
17 Tú endurnýggjart tíni vitnir ímóti mær, og økirt *um* tína harmavreiði uppiá mær; broytingar og kríggj *eru* ímóti mær.
18 Hvørsvegna hevurt tú tá ført meg fram út úr móðurlívinum? Á, at eg hevði givið upp andan, og einkið eyga hevði sæð meg!
19 Eg skuldi havt verið sum um eg ikki hevði verið; eg skuldi havt verðið borin frá móðurlívinum til grøvina.
20 *Eru* ikki dagar mínir fáir? *tá* lætt av, *og* lat meg vera, at eg má fá uggan eitt sindur,
21 Áðrenn eg fari, *hvaðan* eg ikki skal venda aftur, *enntá* til landið av myrkri og skugga deyðans;
22 Eitt land av myrkri, sum myrkur *sjálvt; og* av skugga deyðans, uttan nakra skipan, og *hvar* ljósið *er* sum myrkur.

KAPITUL 11

TÁ tók til máls Zṓ-phâr Nă-ăm-ă-thĭt´-i, og segði,
2 Skuldi ikki fjøldin av orðum verðið svarað? og skuldi ein maður, fullur av snakki, verðið rættvísgjørdur?
3 Skuldu tínar lygnir fingið menn at hildið friði sínum? og tá ið tú spottart, skal eingin maður gera teg til skammar?
4 Tí at tú hevurt sagt, Mín Guðslæra *er* skír, og eg eri reinur í eygum tínum.
5 Men á, at Guð vildi talað, og latið upp sínar varrar ímóti tær;
6 Og at hann vildi sýnt tær vísdómsins loyndardómar, at *teir eru* tvífalt móti tí sum er! Vita tí, at Guð krevur av tær *minni* enn tín misgerð *eigur uppiborið*.
7 Kanst tú við útgrundan finna útav Guði? kanst tú finna útav hinum Almáttuga *fram*at fullkominleika?
8 *Tað er* so hátt sum himin; hvat kanst tú gera? djypri enn helviti; hvat kanst tú vita?
9 Tess mát *er* longri enn jørðin, og breidri enn sjógvurin.
10 Um hann skeri av, og loki aftur, ella savni saman, hvør kann tá forða honum?
11 Tí hann kennir fáfongdar menn: hann sær vondsku eisini; vil hann tá ikki umhugsa *tað?*
12 Tí at fáfongdur maður vildi verið vísur, tó *at* maður verði *seg* føddur *líkasum* eitt villasna fyl.
13 Um tú fyribúgvi hjarta títt, og rætti út tínar hendur mótvegis honum;
14 Um misgerð *veri seg* í tíni hond, set hana langt burtur, og lat ikki vondsku búgva í tabernaklum tínum.
15 Tí at tá skalt tú lyfta upp tínum andliti uttan blett; ja, tú skalt vera støðufastur, og skalt ikki óttast:
16 Av tí at tú skalt gloyma *tín* vesældóm, *og* minnast *hann* sum vøtn *ið* ferðast avstað:
17 Og *tín* aldur skal vera klárari enn middagurin; tú skalt skína fram, tú skalt vera sum morgunin.
18 Og tú skalt vera tryggur, av tí at til er vón; ja, tú skalt grava *ikring teg, og* tú skalt taka tína hvíld í trygd.
19 Tú eisini skalt leggjast niður, og eingin skal gera *teg* ræddan; ja,

mangir skulu bera fram bønorð til tín.

20 Men eygu teirra vondu skulu bila, og teir skulu ei komast undan, og teirra vón *skal vera sum* uppgeving andans.

KAPITUL 12

OG Job svaraði og segði,
2 Óivað *eru* bert tit fólkið, og vísdómur skal doyggja við tykkum.
3 Men eg havi skil eins væl og tit; eg *standi* ikki til afturs fyri tykkum: ja, hvør veit ikki slík ting sum hesi?
4 Eg eri *sum* ēin — háðaður av sínum næsta, sum kallar uppá Guð, og hann svarar honum: hin rættvísi reiðiligi *maðurin verður* læðin í háð.
5 Hann, sum er um at snáva við *sínum* fótum, *er sum* ein lampa — vanvird í hugsanini á honum sum er við ró.
6 Tabernaklini hjá ránsmonnum framganga; og teir, sum upptirra Guð, eru tryggir; inn í hvørs hond Guð førir *ríkiligani*.
7 Men spyr nú djórini, og tey skulu læra teg; og fuglar luftarinnar, og teir skulu siga tær:
8 Ella tala til jarðarinnar, og hon skal læra teg: og fiskar havsins skulu kunngera tær.
9 Hvør veit ikki í øllum hesum, at hond HARRANS hevur virkað hetta?
10 Í hvørs hond *er* sálin hjá hvørjum livandi tingi, og andadrátturin hjá øllum mannkyni.
11 Roynir ikki oyrað orð? og smakkar *ikki* munnurin mat sín?
12 Hjá hinum fyrndargomlu *er* vísdómur; og í longd av døgum skilningur.
13 Hjá honum *er* vísdómur og styrki, hann hevur ráð og skil.
14 Sí, hann brýtur niður, og tað kann ikki verða bygt aftur: hann lokar fyri einum manni, og tað kann eingin upplating verða.
15 Sí, hann heldur aftur vøtnunum, og tey torna upp: hann eisini sendir tey út, og tey hvølva jørðini.
16 Hjá honum *er* styrki og vísdómur: hin villleiddi og villleiðarin *eru* hansara.
17 Hann leiðir ráðgevarar avstað herjaðar, og ger dómararnar *til* dárar.
18 Hann loysir bandið hjá kongum, og gyrðir teirra lendar við einum gyrðli.
19 Hann leiðir prinsar avstað herjaðar, og kolrennur hinar mektigu.
20 Hann firrar burt talu hinna álitigu, og tekur burt skil hinna aldraðu.
21 Hann hellir vanvirðing uppá prinsar, og veikir *um* styrki hinna mektigu.
22 Hann avdúkar djúp ting úr myrkri, og førir út til ljóss deyðsskuggan.
23 Hann økir *um* tjóðirnar, og oyðir tær: hann veksur um tjóðirnar, og treingir tær *aftur*.
24 Hann tekur burtur hjartað á hinum fremstu av fólki jarðarinnar, og elvir teimum at reika í eini oyðu, *har* eingin vegur *er*.
25 Teir trilva í myrkrinum uttan ljós, og hann fær teir at vingla líkasum *ein* drukkin *maður*.

KAPITUL 13

SÍ, mítt eyga hevur sæð alt *hetta*, mítt oyra hevur hoyrt og skilt tað.
2 Hvat tit vita, *tað sama* veit eg eisini: eg *standi* ikki til afturs fyri tykkum.
3 Vissuliga, eg vildi talað til hins Almáttuga, og eg trái at kjakast við Guð.
4 Men tit *eru* samantvinnarar av lygnum, tit *eru* allir læknar av ongum virði.
5 O at tit vildu fullkomiliga hildið friði tykkara! og tað skuldi verið vísdómur tykkara.

6 Hoyrið nú mína røðan, og lurtið eftir áheitanunum av mínum vørrum.
7 Vilja tit tala vondliga fyri Guð? og tosa svikaliga fyri hann?
8 Vilja tit taka ímóti persóni hansara? vilja tit træta fyri Guð?
9 Er tað gott, at hann skuldi grundað tykkum út? ella, eins og ēin maður háðar ein annan, háða tit *soleiðis* hann?
10 Hann vil vissuliga havast at tykkum, um tit loyniliga taka ímóti persónum.
11 Skal ikki hans avbærni gera tykkum ræddar? og hans ønskur falla uppá tykkum?
12 Tykkara endurminningar *eru* líkar øskum, tykkara kroppar við kroppar av leiri.
13 Haldið friði tykkara, latið meg vera, at eg má tala; og lat koma á meg hvat *vil*.
14 Hví taki eg hold mítt í tenn mínar, og seti mítt lív í mína hond?
15 Hóast hann bani mær, tó vil eg líta á hann: men eg vil halda uppi mínum egnu vegum frammi fyri honum.
16 Hann eisini *skal vera* mín frelsa: tí at ein hyklari skal ikki koma framfyri hann.
17 Hoyrið dúgliga mína talu, og mína kunngering við oyrum tykkara.
18 Sí nú, eg havi lagt til rættis *mína* søk; eg veit, at eg skal verða rættvísgjørdur.
19 Hvør *er* hann *sum* vil verja *søk* við meg? tí at nú, um eg haldi tungu míni, skal eg geva upp andan.
20 Einans ger ikki tvinni *ting* innat mær: tá vil eg ikki fjala meg frá tær.
21 Drag aftur tína hond fjart frá mær: og lat ikki tín ønskur gera meg ræddan.
22 Tá kalli tú, og eg vil svara: ella lat meg tala, og svari tú mær.
23 Hvussu mangar *eru* mínar misgerðir og syndir? fá meg at kenna mítt brot og mína synd.
24 Hví fjalirt tú andlit títt, og heldurt meg fyri fígginda tín?
25 Vilt tú bróta eitt leyv — rikið til og frá? og vilt tú elta hin turra hálm?
26 Tí at tú skrivart beiskar lutir ímóti mær, og fært meg at ognast misgerðir ungdóms míns.
27 Tú seturt mínar føtur eisini í stokkin, og líturt snævurligani at øllum mínum gøtum; tú seturt eitt prent uppá hælirnar á mínum fótum.
28 Og hann, sum eitt rotið ting, upptærir; sum eitt plagg sum er møletið.

KAPITUL 14

MAÐUR, *sum er* føddur av kvinnu, *er* av fáum døgum, og fullur av órógv.
2 Hann kemur fram líka *sum* ein blóma, og verður skorin niður: hann flýggjar eisini sum ein skuggi, og heldur ikki áfram.
3 Og opnart tú tíni eygu uppá ēin slíkan, og førirt meg inn í dóm hjá tær?
4 Hvør kann koma við einum reinum *tingi* úr einum óreinum? ikki ēin.
5 Við tað at hansara dagar *eru* avráddir, talið á hansara mánaðum *eru* hjá tær, tú hevurt ásett hansara mørk, sum hann kann ei fara um;
6 Vend frá honum, at hann má hvíla, til hann skal fullføra, sum ein leigusveinur, sín dag.
7 Tí at tað er vón um eitt træ, um tað verði skorið niður, at tað vilji spíra aftur, og at hin bleyta grein tess vilji ikki halda uppat.
8 Hóast tess rót vaksi gomul á jørðini, og tess stumpur doyggi í lendinum;
9 *Tó* gjøgnum angan av vatni vil tað spíra, og bera fram bular líka *sum* ein planta.

10 Men maður doyr, og tærist burtur: ja, maður gevur upp andan, og hvar *er* hann?
11 *Eins og* vøtnini dvína frá sjónum, og flóðin ferst og tornar upp:
12 Soleiðis maður legst niður, og rísur ikki: til himnarnir *verði* ei meira, skulu teir ikki vakna, ella verða reistir úr svøvni sínum.
13 O at tú vildirt fjalt meg í grøvini, at tú vildirt hildið meg loyndan, inntil tín vreiði verði umliðin, at tú vildirt peikað mær út eina ásetta tíð, og minst til mín!
14 Um ein maður doyggi, skal hann liva *aftur?* allar dagarnar av míni ásettu tíð vil eg bíða, til mín broyting komi.
15 Tú skalt kalla, og eg vil svara tær: tú vilt hava eina tráan til verks handa tína.
16 Tí at nú upptelurt tú míni fet: vakirt tú ikki yvir míni synd?
17 Mítt brot *er* innsiglað í eini tasku, og tú seymart upp mína misgerð.
18 Og vissuliga, fjallið *sum* fellur kemur til einkiðs, og kletturin verður burtfluttur úr sínum plássi.
19 Vøtnini máa steinarnar: tú tváart burt tingini sum vaksa úr dusti jarðarinnar; og tú oyðirt vónina hjá manni.
20 Tú hevurt yvirvág um ævir ímóti honum, og hann svinnur: tú broytirt ásjón hans, og sendirt hann burt.
21 Hansara synir koma til heiðurs, og hann veit *tað* ikki; og teir verða førdir lágt, men hann varnast *tað* ikki um teir.
22 Men hansara hold uppiá honum skal hava pínu, og hansara sál innan í honum skal harmast.

KAPITUL 15

TÁ svaraði Ē´-lĭ-phăz Tê-măn-ĭt´-i, og segði,
2 Skuldi ein vísur maður mælt fáfongdan kunnleika, og fylt kvið sín við eystanvindinum?
3 Skuldi hann røtt við ógagnligum snakki? ella við talum, við hvørjum hann onga nyttu kann gera?
4 Ja, tú kastart av ótta, og heldurt tilbakar bøn frammi fyri Guði.
5 Tí at tín muður mælir misgerð tína, og tú velurt tungu hinna listinlærdu.
6 Tín egni munnur dómfellir teg, og ikki eg: ja, tínar egnu varrar vitna ímóti tær.
7 *Ert* tú hin fyrsti maðurin *sum* varð føddur? ella varðst tú gjørdur undan heyggjunum?
8 Hevurt tú hoyrt loyndarmál Guðs? og afturheldurt tú vísdóm til tín sjálvs?
9 Hvat veitst tú, sum vit vita ikki? *hvat* skilurt tú, sum *er* ikki í okkum?
10 Hjá okkum *eru* bæði hinir gráhærdu og sera gomlu menn, nógv eldri enn faðir tín.
11 *Eru* troystanir Guðs lítlar hjá tær? er nakar loyndur lutur hjá tær?
12 Hví ber títt hjarta teg burtur? og hvørjum blunka eygu tíni eftir,
13 At tú vendirt tínum anda ímóti Guði, og leturt *slík* orð fara út úr munni tínum?
14 Hvat *er* maður, at hann skuldi verið reinur? og *hann, sum er* føddur av eini kvinnu, at hann skuldi verið rættvísur?
15 Sí, hann setur einkið álit á heilagu sínar; ja, himnarnir eru ikki reinir í eygsjón hans.
16 Hvør mikið meiri andstyggiligur og gravskitin *er* maður, sum drekkur misgerð líkasum vatn?
17 Eg vil sýna tær, hoyr meg; og tað, *sum* eg havi sæð, vil eg kunngera;
18 Sum vísir menn hava talt frá fedrum sínum, og hava ikki fjalt *tað:*
19 Hvørjum aleinaum jørðin varð givin, og eingin fremmandur ferðaðist teirra millum.

20 Hin vondi maðurin stríðist við pínu allar dagar *sínar,* og talið á árum er fjalt fyri kúgaranum.
21 Eitt ønskriligt ljóð *er* í oyrum hansara: í framgongd skal oyðarin koma uppá hann.
22 Hann trýr ikki, at hann skal koma aftur úr myrkri, og hann verður bíðaður eftir av svørðinum.
23 Hann reikar útium eftir breyði, *sigandi,* Hvar *er tað?* hann veit, at myrkursins dagur er tilreiðar við hond hansara.
24 Trongd og angist skulu gera hann ræddan; tey skulu hava yvirvág ímóti honum, sum ein kongur klárur til orrustuna.
25 Tí hann rættir út sína hond ímóti Guði, og styrkir seg sjálvan ímóti hinum Almáttuga.
26 Hann rennur uppá hann, *enntá* á *hansara* svíra, uppá tær tjúkku kúlurnar av hansara smáskjøldrum:
27 Av tí at hann dekkar sítt andlit við fiti síni, og ger kjøtflísar av feitti á síðum *sínum.*
28 Og hann býr í oydnum býum, *og* í húsum sum eingin maður íbýr, sum eru tilreiðar at gerast rúgvur.
29 Hann skal ei verða ríkur, eiheldur skal hansara *figgjar*evni halda áfram, eiheldur skal hann framleingja fullkomingeringina av tí uppiá jørðini.
30 Hann skal ei fara avstað út úr myrkri; login skal turka upp hansara greinar, og við̂ andadráttinum av sínum munni skal hann fara burtur.
31 Lat ikki hann, sum er villleiddur, líta á fáfongd: tí fáfongd skal verða hansara viðurgjald.
32 Tað skal verða fullført, áðrenn tíð hansara; og hansara grein skal ei verða grøn.
33 Hann skal rysta av sína óstadnu víndrúvu sum víntræið, og skal kasta av sína blómu sum olivintræið.
34 Tí at samkoman hjá hyklarum *skal verða* oyðin, og eldur skal upptæra tabernaklini hjá mutri.
35 Teir framala mein, og bera fram fáfongd, og teirra búkur fyrireikar svik.

KAPITUL 16

TÁ svaraði Job og segði,
2 Eg havi hoyrt mong slík ting: vesæligir uggarar *eru* tit allir.
3 Skulu fáfongd orð fáa ein enda? ella hvat dirvir um teg, at tú svarart?
4 Eg eisini kundi talað sum tit *gera:* um tykkara sál var í stað sálar mínar, kundi eg hópað upp orð̆ ímóti tykkum, og ryst mítt høvur eftir tykkum.
5 *Men* eg vildi styrkt tykkum við munni mínum, og rørslan av mínum varrum skuldi linkað *um harm tykkara.*
6 Tó *at* eg tali, verður mín harmur ikki linkaður *um:* og *tó at* eg lætti av, hvat verði eg linnaður?
7 Men nú hevur hann gjørt meg móðan: tú hevurt gjørt oyði alt mítt samlag.
8 Og tú hevurt fylt meg við rukkum, *sum* er eitt vitni *ímóti mær:* og mín visni, rísandi upp í mær, ber vitnisburð fyri andliti mínum.
9 Hann skræðir *í meg* í síni vreiði, hvør meg hatar: hann grístar uppá meg við sínum tonnum; mín figgindi skerpir síni eygu uppá meg.
10 Teir hava gapað uppá meg við sínum munni; teir hava vanærisligani sligið meg uppá kjálkan; teir hava savnað seg saman ímóti mær.
11 Guð hevur flýggjað meg til hinna ógudiligu, og givið meg yvir inn í hendur hinna vondu.
12 Eg var í friði *og náðum,* men hann hevur brotið meg sundur: hann hevur eisini tikið *meg* eftir

mínum svíra, og ryst meg í stykkir, og sett meg upp til sítt mið.
13 Hansara bogaskjúttar umringa meg rundan um, hann klývur míni nýru sundur, og eirir ikki; hann hellir út mítt gall uppá jørðina.
14 Hann brýtur meg við skarði omaná skarð, hann rennur uppá meg líkasum ein risi.
15 Eg havi seymað sekkjaklæði uppá mína húð, og dálkað mítt horn í støvinum.
16 Mítt andlit er ekult við gráti, og á mínum eygnalokum *er* skuggi deyðans;
17 Ikki fyri *nakað* órættlæti í hondum mínum: eisini mín bøn *er* skír.
18 O jørð, hyl ikki tú mítt blóð, og lat mítt róp einkið pláss hava.
19 Eisini nú, sí, mítt vitni *er* í himni, og mín frágreiðing *er* á hædd*ini*.
20 Mínir vinir háða meg: *men* mítt eyga hellir út *tárum* at Guði.
21 O at ēin mátti vart søk fyri ein mann hjá Guði, sum ein maður *verjir søk* fyri sín næsta!
22 Tá ið nøkur fá ár eru komin, tá skal eg fara vegin, *hvaðan* eg skal ei koma aftur.

KAPITUL 17

MÍN andadráttur er spiltur, mínir dagar eru útdeyðir, gravirnar *eru tilreiðar* til mín.
2 *Eru* ikki háðarar hjá mær? og heldur ikki mítt eyga áfram í teirra tirring?
3 Legst niður nú, set meg í eina pants*tøðu* hjá tær; hvør *er* hann *sum* vil takast í hendur við meg?
4 Tí at tú hevurt fjalt teirra hjarta frá skili: tí skalt tú ikki upphevja *teir*.
5 Hann, sum talar smikran fyri *sínum* vinum, enntá eyguni hjá hansara børnum skulu bila.
6 Hann hevur gjørt meg eisini *til* eitt háðorð hjá fólkinum; og í farnari tíð var eg sum ein tamburīn.
7 Mítt eyga eisini er dimt uppá grund av sorg, og allir mínir limir *eru* sum ein skuggi.
8 Rættskafnir *menn* skulu verða ógvaðir yvir hesum, og hin sakleysi skal røra seg upp ímóti hyklaranum.
9 Hin rættvísi eisini skal halda *fast* á vegi sínum; og hann, sum reinar hevur hendur, skal verða sterkari og sterkari.
10 Men hvat tykkum øllum viðvíkur, vendið tit aftur, og komið nú: tí at eg dugi ikki *at* finna *ēin* vísan *mann* tykkara millum.
11 Mínir dagar eru umlidnir, mínar ætlanir eru brotnar av, *enntá* hugsanirnar hjá mínum hjarta.
12 Teir broyta náttina yvirí dag: ljósið *er* stutt uppá grund av myrkri.
13 Um eg bíði, *so er* grøvin mítt hús: eg havi reitt mína song í myrkrinum.
14 Eg havi sagt til rot, Tú *ert* faðir mín: til ormin, *Tú ert* móðir mín, og systir mín.
15 Og hvar *er* nú vón mín? hvat vón míni viðvíkur, hvør skal sjá hana?
16 Tær skulu fara niður til holunnar rimar, tá ið *okkara* hvíla tilsaman *er* í støvinum.

KAPITUL 18

TÁ svaraði Bildad Sjū-hĭt´-i, og segði,
2 Hvussu leingi *vil tað vera, áður enn* tit geri lok á orðum? merkið *tykkum,* og síðan vilja vit tala.
3 Hvørsvegna verða vit roknaðir sum djór˘, *og* mettir ønskriligir í tíni eygsjón?
4 Hann skræðir seg *sundur* í síni øði: skal jørðin verða yvirgivin fyri teg? og skal kletturin verða burtfluttur úr sínum plássi?
5 Ja, ljós hins vonda skal verða

sløkt, og neistin av hansara ljósi skal ikki skína.
6 Ljósið skal verða myrkt í tabernakli hansara, og hansara kerti skal verða sløkt við honum.
7 Fetini av hansara styrki skulu verða treingjaði, og hans egna ráð skal kasta hann niður.
8 Tí hann verður kastaður inn í eitt net av egnu fótum hansara, og hann gongur omanyvir eina snerru.
9 Fellan skal taka *hann* eftir hælinum, *og* ránsmaðurin skal hava yvirvág ímóti honum.
10 Snerran *er* løgd til hansara í lendinum, og ein fella til hansara í veginum.
11 Ræðslur skulu gera hann ræddan á hvørjari síðu, og skulu reka hann til hansara føtur.
12 Hansara styrki skal verða hungurstungin, og oyðing *skal vera* tilreiðar við hansara síðu.
13 Hon skal upptæra styrkina av hansara húð: *enntá* hin fyrstiføddi deyðans skal upptæra hansara styrki.
14 Hansara treyst skal verða slitið *upp* við rót út úr tabernakli hansara, og tað skal føra hann til kong ræðslanna.
15 Hon skal búgva í tabernakli hansara, av tí at *tað er* als ikki hansara: brennisteinur skal verða breiddur uppá bústað hansara.
16 Hansara røtur skulu verða turkaðar upp í neðra, og í erva skal hansara grein verða skorin av.
17 Hansara minni skal farast frá jørðini, og hann skal einkið navn hava í strætinum.
18 Hann skal verða rikin frá ljósi yvirí myrkur, og eltur úr veroldini.
19 Hann skal hvørki hava son ella bróðurson millum fólks síns, ella nakran verðandi í bústøðum sínum.
20 Teir, sum koma eftir *hann*, skulu verða ógvaðir yvir hansara dag; eins og teir, sum fóru undan, vóru ræðsluslignir.
21 Vissuliga, slíkir *eru* bústaðirnir hjá tí vonda, og hetta *er* plássið *hjá honum sum* ei kennir Guð.

KAPITUL 19

TÁ svaraði Job og segði,
2 Hvussu leingi vilja tit plága mína sál, og bróta meg í stykkir við orðum?
3 Hesar tíggju ferðir hava tit háðað meg: tit skammast ikki, *at* tit gera tykkum fremmandar fyri mær.
4 Og veri tað í roynd *og veru*, *at* eg eri farin skeivur, verður mín villfaring verandi hjá mær sjálvum.
5 Um í roynd *og veru* tit vilji gera *tykkum* stórar ímóti mær, og sakføra ímóti mær mína skemd:
6 Vitið nú, at Guð hevur kollrent meg, og hevur umringað meg við sínum neti.
7 Sí, eg rópi út um rangt, men eg verði ikki hoyrdur: eg rópi hart, men eingin dómur *er*.
8 Hann hevur byrgt upp mín veg, at eg kann ei fara framvið, og hann hevur sett myrkur á mínar rásir.
9 Hann hevur berkað meg fyri mína dýrd, og tikið krúnuna *frá* mínum høvdi.
10 Hann hevur oytt meg á hvørjari síðu, og eg eri farin: og mína vón hevur hann burtflutt líkasum eitt træ.
11 Hann hevur eisini kynt sína vreiði ímóti mær, og hann roknar meg yvirfyri sær sum *ein av* sínum fíggindum.
12 Hansara fylkingar koma saman, og reisa upp sín veg ímóti mær, og leirast rundan um tabernakkul mítt.
13 Hann hevur sett mínar bræður langt frá mær, og mínir kunningar eru sanniliga fremmandgjørdir frá mær.

14 Míni skyldfólk hava svitast, og mínir kunnigu vinir hava gloymt meg.
15 Tey, sum búgva í húsi mínum, og ternur mínar, rokna meg sum ein fremmandan: eg eri ein ókunnumaður í teirra eygsjón.
16 Eg kallaði tænara mín, og hann gav *mær* einkið svar; eg bønaði hann við mínum munni.
17 Mín andadráttur er fremmandur fyri konu míni, hóast eg bønaði fyri *søkina* hjá børnum egna likams míns.
18 Ja, ung børn vanvirdu meg; eg reistist, og tey talaðu ímóti mær.
19 Øllum mínum innvortis vinum stóðst við meg: og teir, sum eg elskaði, eru vendir ímóti mær.
20 Mítt bein krøkist mót míni húð og mót mínum holdi, og eg eri sloppin undan við húð tanna mína.
21 Havið várkunn yvir meg, havið várkunn yvir meg, O tit vinir mínir; tí at hond Guðs hevur nomið *við* meg.
22 Hví søkja tit at mær sum Guð, og eru ikki nøgdir við kjøt mítt?
23 Á, at míni orð nú vórðu skrivað! á, at tey vórðu prentað í eina bók!
24 At tey vórðu rist við einum jarnpenni og blýggi í klettin um ævir!
25 Tí at eg veit, *at* loysnari mín livir, og *at* hann skal standa á hinum seinna *degi* uppiá jørðini:
26 Og *hóast* eftir mína húð, *ormar* oyði hetta *likam,* tó í mínum kjøti skal eg sjá Guð:
27 Hvønn eg skal sjá fyri meg sjálvan, og míni eygu skulu skoða, og ikki ein annan; *hóast* míni nýru verði upptærd innan í mær.
28 Men tit skuldu sagt, Hví søkja vit at honum, við tað at rótin til málið er funnin í mær?
29 Verið tit ræddir fyri svørðinum: tí at vreiði *ber* revsingar svørðsins, at tit mega vita, *at* ein dómur *finst*.

KAPITUL 20

TÁ svaraði Zṓ-phâr Ná-ăm-ă-thĭt́-i, og segði,
2 Tí elva mínar hugsanir mær at svara, og fyri *hetta* geri eg skjótt *av*.
3 Eg havi hoyrt atfinningina til mína skemd, og andin av mínum skili elvir mær at svara.
4 Veitst tú *ikki* hetta frá gomlum *av,* síðan maður varð settur uppá jørð,
5 At sigursfagnan teirra vondu *er* stutt, og hyklarans frøi *bert* í eitt bil?
6 Hóast hans avbærni hópist upp til himnanna, og hans høvur nái at skýggjunum;
7 *Tó* skal hann glatast um ævir líka *sum* egna skarn hansara: teir, sum hava sæð hann, skulu siga, Hvar *er* hann?
8 Hann skal fljúgva avstað sum ein dreymur, og skal ei verða funnin: ja, hann skal verða eltur burt sum ein náttarsjón.
9 Eygað eisini, *sum* sá hann, skal *sjá hann* ei meir; eiheldur skal hansara plass longur skoða hann.
10 Hansara børn skulu royna at toknast teim fátæku, og hans hendur skulu endurbøta teirra góðs.
11 Hansara bein eru full *av synd* ungdóms hansara, sum skulu leggjast niður við honum í støvið.
12 Hóast vondska veri søt í hans munni, *hóast* hann fjali hana undir síni tungu;
13 *Hóast* hann eiri henni, og yvirgevi hana ei; men haldi henni stillari innan í sínum munni:
14 *Tó* verður hansara matur í hans innvølum vendur, *tað er* gallin av eiturslangum innan í honum.
15 Hann hevur svølgt niður ríkdómar, og hann skal spýggja

teir upp aftur: Guð skal kasta teir út úr hans kviði.
16 Hann skal súgva eitrið av eiturslangum: tungan av eiturorminum skal vega hann.
17 Hann skal ei síggja áirnar, streymarnar, áarløkirnar av hunangi og smøri.
18 Tað, sum hann strevaði fyri, skal hann endurbøta, og skal ikki svølgja *tað* niður: samsvarandi við *hansara fíggjar*evni *skal* endurbøtingin *vera,* og hann skal ikki fegnast *harí.*
19 Av tí at hann hevur kúgað *og* hevur yvirgivið hinar fátæku; *av tí at* hann hevur harðliga tikið burtur eitt hús sum hann ikki bygdi;
20 Vissuliga, hann skal ei kenna kvirru í sínum kviði, hann skal ikki bjarga av tí sum hann tráaði.
21 Tað skal einkið av hansara mati vera eftir; tí skal eingin maður leita eftir hans ognum.
22 Í fullsemini av sínum tilstrekkiligleika skal hann vera í trongstøðum: hvør hond hjá tí vonda skal koma uppá hann.
23 *Tá ið* hann er um at fylla sín kvið, skal *Guð* kasta øðina av síni vreiði uppá hann, og skal regna *hana* uppá hann meðan hann etur.
24 Hann skal flýggja frá jarnvápninum, *og* bogin av stál skal slá hann ígjøgn.
25 Tað er drigið, og kemur út úr likaminum; ja, tað skyggjandi svørðið kemur úr hans galli: ræðslur *eru* uppiá honum.
26 Alt myrkur *skal verða* goymt í hans loyniligu plássum: ein eldur, ei blástur, skal upptæra hann; tað skal ganga illa við honum sum er eftir í tabernakli hans.
27 Himinin skal opinbera hansara misgerð; og jørðin skal rísa upp ímóti honum.
28 Grøðin hjá hansara húsi skal fara avstað, *og hansara góðs* skal floyma burtur á deginum av hansara vreiði.
29 Hesin *er* skamturin hjá einum vondum manni frá Guði, og arvurin útnevndur honum av Guði.

KAPITUL 21

MEN Job svaraði og segði,
2 Hoyrið dúgliga mína talu, og latið hetta vera tykkara troystanir.
3 Loyvið mær, at eg má tala; og eftir at eg havi talað, háðið áfram.
4 Hvat mær viðvíkur, *er* mín klaga fyri manni? og um *so var,* hví skuldi ikki mín andi verðið órógvaður?
5 Merkið *tykkum* meg, og verðið ógvaðir, og leggið *tykkara* hond uppá *tykkara* munn.
6 Sjálvt tá ið eg minnist, eri eg ræddur, og nøtran tekur hald á mínum holdi.
7 Hvørsvegna liva hinir vondu, gerast gamlir, ja, eru mektigir í kraft?
8 Teirra sáð verður grundfest í teirra eygsjón hjá teimum, og teirra avkom frammi fyri eygum teirra.
9 Teirra hús *eru* trygg frá ótta, eiheldur *er* stavur Guðs uppiá teimum.
10 Teirra tarvur makast, og svitast ikki; teirra kúgv kálvar, og kastar ikki kálv sín.
11 Teir senda fram hini smáu síni líkasum eitt fylgi, og teirra børn dansa.
12 Tey taka tamburīnina og hørpuna, og fegnast við ljóðið av líranum.
13 Tey brúka sínar dagar í ríkleika, og í eini løtu fara niður til grøvina.
14 Tey tessvegna siga við Guð, Vík frá okkum; tí at vit tráa ikki kunnleikan til tínar vegir.
15 Hvat *er* hin Almáttugi, at vit skuldu tænt honum? og hvat gagn skuldu vit havt, um vit biðja til hansara?

16 Sí, teirra góða *er* ikki í teirra hond: ráð hinna vondu er fjart frá mær.

17 Hvør ofta verður kerti teirra vondu sløkt! og *hvør ofta* kemur teirra oyðing uppá teir! *Guð* lutar út sorgir í síni øði.

18 Teir eru sum hálmur frammi fyri vindinum; og sum dumba, sum stormurin ber burtur.

19 Guð leggur niðurfyri hansara misgerð til hansara børn: hann endurrindar honum, og hann skal vita *tað*.

20 Hans eygu skulu síggja hans oyðing, og hann skal drekka av vreiði hins Almáttuga.

21 Tí at hvørja fragd *hevur* hann í hans húsi eftir hann, tá ið talið á hansara mánaðum er skorið av í miðjuni?

22 Skal *nakar* læra Guð kunnleika? við tað at hann dømir teir sum eru høgir.

23 Ein doyr í síni fullu styrki, verandi heilt við frið og ró.

24 Hansara bróst eru full av mjólk, og hansara bein eru vætt við mergi.

25 Og ein annar doyr í beiskleikanum av síni sál, og etur aldri við fragd.

26 Teir skulu leggjast niður líka í dustið, og maðkarnir skulu hylja teir.

27 Sí, eg kenni tykkara hugsanir, og tey snildarráð *sum* tit rangliga ímynda ímóti mær.

28 Tí at tit siga, Hvar *er* húsið hjá prinsinum? og hvar *eru* bústøðini hjá teimum vondu?

29 Hava tit ikki spurt teir sum fara eftir veginum? og kenna tit ikki teirra tekin,

30 At hin vondi verður goymdur til oyðingardagin? teir skulu verða førdir fram til vreiðidagin.

31 Hvør skal kunngera hansara veg upp í hans andlit? og hvør skal endurgjalda honum *tað sum* hann hevur gjørt?

32 Tó skal hann verða førdur til grøvina, og skal verða verandi í gravar*heygnum*.

33 Dalsins bøkkar skulu verða honum søtir, og hvør maður skal dragast eftir honum, eins og *tað eru* ótalligir undan honum.

34 Hvussu ugga tit meg tá í fáfongd, við tað at í tykkara svarum verður verandi fals?

KAPITUL 22

TÁ svaraði Ē′lĭ-phăz Tê-mănĭt′-i og segði,

2 Kann ein maður vera gagnligur hjá Guði, eins og hann, ið er vísur, kann vera gagnligur hjá sær sjálvum?

3 *Er tað* nøkur fragd hjá tí Almáttuga, at tú ert rættvísur? ella *er tað* vinningur *hjá honum,* at tú gert tínar vegir fullkomnar?

4 Vil hann írættaseta teg av ótta fyri tær? vil hann innfara við tær inn í dóm?

5 *Er* ikki tín vondska mikil? og tínar misgerðir markleysar?

6 Tí at tú hevurt tikið eitt pant frá bróður tínum fyri einkið, og berkað tey naknu fyri teirra klædnað.

7 Tú hevurt ei givið vatn til hin útmødda at drekka, og tú hevurt hildið aftur breyði frá tí svanga.

8 Men *hvat* hinum mektiga manni *viðvíkur,* hann hevði jørðina; og hin heiðursami maður dvaldist í henni.

9 Tú hevurt sent einkjur avstað tóm*hent*ar, og armar teirra faðirleysu eru vorðnir brotnir.

10 Tessvegna *eru* snerrur rundan um teg, og bráður ótti órógvar teg;

11 Ella myrkur, *at* tú kanst ikki síggja; og ovurnøgd av vøtnum hylja teg.

12 *Er* ikki Guð í hædd himins? og skoða stjarnanna hædd, hvussu høgar tær eru!

13 Og tú sigurt, Hvussu veit Guð? kann hann døma ígjøgnum tað myrka skýggið?
14 Tjúkk skýggj *eru* ein dekking hjá honum, at hann sær ikki; og hann gongur í ringrás himins.
15 Hevurt tú merkt *tær* tann gamla vegin, sum vondir menn hava traðkað?
16 Sum vórðu skornir niður uttanfyri tíð, hvørs grundvøllur varð floymdur yvir við eini flóð:
17 Sum søgdu við Guð, Vík frá okkum: og hvat kann hin Almáttugi gera fyri teir?
18 Tó fylti hann teirra hús við góðum *tingum:* men ráð teirra vondu er fjart frá mær.
19 Hinir rættvísu *tað* síggja, og eru glaðir: og hinir sakleysu læa teir í háð.
20 Hvarafturímóti okkara *figgjar*evni er ei skorið niður, men leivdina av teimum eldurin upptærir.
21 Ger teg nú kendan við hann, og ver við frið: harvið gott skal koma at tær.
22 Tak ímóti, eg biði teg, lógini frá hansara munni, og legg niðurfyri orðini hjá honum í tínum hjarta.
23 Um tú vendi aftur til hins Almáttuga, skalt tú verða bygdur upp, tú skalt seta burt misgerð fjart frá tabernaklum tínum.
24 Tá skalt tú leggja niðurfyri gull sum støv, og *gullið* úr Ó·phīr sum steinar áarløkanna.
25 Ja, hin Almáttugi skal vera tín verja, og tú skalt hava ríviligt av silvuri.
26 Tí at tá skalt tú hava tína lyst í tí Almáttuga, og skalt lyfta upp tínum andliti at Guði.
27 Tú skalt gera tína bøn at honum, og hann skal hoyra teg, og tíni heitstreingir skalt tú rinda.
28 Tú skalt eisini avráða eitt ting, og tað skal vera grundað hjá tær: og ljósið skal skína uppá tínar vegir.
29 Tá ið *menn* eru niðurkastaðir, tá skalt tú siga, *Tað finst* upplyfting; og hann skal frelsa hin eyðmjúka persón.
30 Hann skal bjarga oyggini hjá tí sakleysa: og hon er bjargað við skírleikanum av tínum hondum.

KAPITUL 23

TÁ svaraði Job og segði,
2 Enntá í dag *er* mín klaga beisk: mítt slag er tyngri enn mín eymkan.
3 Á, at eg vitsti hvar eg kundi funnið hann! *at* eg mátti komið *enntá* til hansara sæti!
4 Eg vildi skipað *mína* søk frammi fyri honum, og fylt mín munn við próvgrundum.
5 Eg vildi vitað orðini *sum* hann vildi svarað mær; og skilt hvat hann vildi sagt við meg.
6 Vil hann føra søk ímóti mær við *sínum* mikla mátti? Nei; men hann vildi lagt *styrki* í meg.
7 Har hin rættvísi mátti kjakast við hann; so skuldi eg verðið bjargaður um ævir frá mínum dómara.
8 Sí, eg fari frameftir, men hann *er* ikki *har;* og aftureftir, men eg kann ikki varnast hann:
9 Til hinnar vinstru handar, har hann arbeiðir, men eg kann ikki skoða *hann:* hann fjalir seg til hinnar høgru handar, at eg kann ei sjá *hann:*
10 Men hann kennir vegin sum eg taki: *tá ið* hann hevur roynt meg, skal eg koma fram sum gull.
11 Mín fótur hevur hildið hansara fet, hansara veg havi eg varðveitt, og ikki vikið aftur.
12 Eiheldur eri eg farin tilbakar frá boði varra hansara; eg havi mett orðini av hansara munni meir enn mín neyðuga *mat*.
13 Men hann *er* í einum *huga,* og hvør kann venda honum? og *hvat* hansara sál tráar, enntá *tað* hann ger.

14 Tí hann innir *tað ting sum er* ásett til mín: og mong slík *ting tað eru* hjá honum.
15 Tí eri eg órógvaður við hansara nærveru: tá ið eg hugleiði, eri eg ræddur fyri honum.
16 Tí at Guð ger mítt hjarta bleytt, og hin Almáttugi órógvar meg:
17 Av tí at eg varð ei skorin av frammi fyri myrkrinum, *eiheldur* hevur hann hult myrkrið fyri andliti mínum.

KAPITUL 24

HVÍ, við tað at tíðir eru ikki fjaldar fyri hinum Almáttuga, síggja ikki teir, sum kenna hann, hansara dagar?
2 *Summir* burtflyta landamørkini; teir harðliga taka burtur smáfæafylgir, og matast *harav*.
3 Teir reka burt asnan hjá faðirloysinganum, teir taka oksa einkjunnar til pant.
4 Teir venda tí tørvandi út av veginum: jarðarinnar fátæku fjala seg saman.
5 Sí, *sum* villasnar í oyðimørkini fara teir fram til sítt arbeiði; rísandi betíðs til eina bráð: oyðan *letur* mat til teirra *og* til *teirra* børn.
6 Teir heysta *hvør og ēin* korn sítt í akrinum: og teir savna vínskurð hins vonda.
7 Teir volda teimum naknu at halda til uttan klædnað, at *teir* í kuldanum *hava* onga huld.
8 Teir eru vátir av skúrunum úr fjøllunum, og umfevna klettin fyri trot á einum skýli.
9 Teir slíta hin faðirleysa frá bróstinum, og taka eitt pant av tí fátæka.
10 Teir volda *honum* at ganga nakin uttan klædnað, og teir taka burt bundið *frá* hinum svongu;
11 *Sum* gera olju fyri innan sínar veggir, *og* treða *sínar* vínpersur, og líða torsta.
12 Menn eymkast uttan úr staðinum, og sál hinna særdu rópar út: tó leggur Guð ikki dárskap *til teirra*.
13 Teir eru av teimum sum gera uppreist ímóti ljósinum; teir kenna ikki tess vegir, ella verða *verandi* í tess rásum.
14 Myrðarin, rísandi við ljósinum, drepur hin fátæka og tørvandi, og um náttina er sum ein tjóvur.
15 Eygað eisini hjá hordómsfremjaranum bíðar eftir hálvalýsinum, sigandi, Einkið eyga skal sjá meg: og dulbýr *sítt* andlit.
16 Í myrkrinum grava teir ígjøgnum hús, *sum* teir høvdu merkt til sín sjálvs um dagsleitið: teir kenna ikki ljósið.
17 Tí at morgunin *er* fyri teimum enntá sum deyðsskuggin: um *ēin* kenni *teir, eru teir í* deyðsskuggans ræðslum.
18 Hann *er* skjótur sum vøtnini; teirra skamtur er bannaður á jørðini: hann skoðar ikki víngarðanna veg.
19 Turkur og hiti upptæra snjóvøtnini: *soleiðis ger* grøvin *við teir sum* hava syndað.
20 Móðurlívið skal gloyma hann; ormurin skal føða *seg* søtligani á honum; hann skal ei meira verða mintur; og vondska skal verða brotin sum eitt træ.
21 Hann fer ilt við hini óburnu *sum* føðir ikki: og ger ikki gott móti einkjuni.
22 Hann dregur eisini hinar mektigu við síni makt: hann rísur upp, og eingin *maður* er vísur um lív.
23 *Tó at* tað verði givið honum *at vera* í tryggleika, hvará hann hvílir; tó *eru* hans eygu uppá teirra vegir.
24 Teir verða upphevjaðir í eina stutta stund, men verða farnir og førdir lágt; teir verða tiknir út av veginum eins og allir *aðrir*, og skornir av sum topparnir á kornøksunum.

25 Og um *tað veri* ikki *so* nú,
hvør vil gera meg *til* ein lygnara,
og gera talu mína einkið verda?

KAPITUL 25

TÁ svaraði Bildad Sjū-hīt´-i, og segði,
2 Harradømi og ótti *eru* hjá
honum, hann stiftar frið í sínum
høgu plássum.
3 Er nakað tal á hans herum? og
uppá hvønn rísur ikki hans ljós?
4 Hvussu kann maður tá verða
rættvísgjørdur hjá Guði? ella
hvussu kann hann vera reinur,
sum er føddur av eini kvinnu?
5 Skoða enntá til mánan, og
hann skínur ikki; ja, stjørnurnar
eru ikki skírar í hans eygsjón.
6 Hvør mikið minni maður,
sum er ein ormur? og menniskjusonurin, *sum er* ein ormur?

KAPITUL 26

MEN Job svaraði og segði,
2 Hvussu hevurt tú hjálpt
honum sum er uttan kraft? *hvussu*
frelsirt tú armin *sum* onga styrki
hevur?
3 Hvussu hevurt tú ráðgivið
honum sum ongan vísdóm *hevur?*
og *hvussu* hevurt tú ríkiliga kunngjørt tingið sum tað er?
4 Fyri hvørjum[p] hevurt tú mælt
orðum? og hvørs andi kom frá
tær?
5 Deyð *ting* verða myndaði innan undan vøtnunum, og íbúgvum
tess.
6 Helviti *er* nakið frammi fyri
honum, og oyðing hevur onga
dekking.
7 Hann tenur út norðurið yvir
hitt tóma plássið, *og* hongur jørðina uppá einkið.
8 Hann bindur upp vøtnini í sínum tjúkku skýggjum; og skýggið
verður ikki skrætt undir teimum.
9 Hann afturheldur ásjónina á
sínum hásæti, *og* breiðir sítt skýggj
uppá tað.
10 Hann hevur kringfarið vøtnini við mørkum, inntil dagurin og
náttin koma til ein enda.
11 Súlur himins nøtra og verða
ógvaðar við hans átalu.
12 Hann atskilur sjógvin við
síni kraft, og við^ sínum skili hann
slær gjøgnum hin stolta.
13 Við^ sínum anda hann hevur
prýtt himnarnar; hans hond hevur myndað hin krókuta høggorm.
14 Sí, hetta *eru* partar av hansara vegum: men hvør lítil ein
skamtur er hoyrdur um hann?
men toruna av hansara mátti
hvør kann skilja?

KAPITUL 27

JOB harafturat helt áfram sína dømisøgu, og segði,
2 *Sum* Guð livir, *sum* hevur tikið burtur mín dóm; og hin Almáttugi, *sum* hevur nívt mína sál;
3 Alla ta stund *ið* mín andadráttur *er* í mær, og Guðs andi *er*
í mínum nasum;
4 Skulu varrar mínar ei tala
vondsku, ella mín tunga mæla
svik.
5 Guð sýti *fyri,* at eg skuldi rættvísgjørt tykkum: til eg doyggi, vil
eg ikki firra mín heilleika frá mær.
6 Míni rættvísi haldi eg fast,
og vil ikki lata hana fara: mítt
hjarta skal ikki brigsla *mær,* so
leingi sum eg livi.
7 Lat mín figginda verða sum
hin vondi; og hann, ið rísur upp
ímóti mær, sum hin órættvísi.
8 Tí hvat *er* vónin hjá hyklaranum, hóast hann hevur ávunnist,
tá ið Guð tekur burtur hansara
sál?
9 Vil Guð hoyra hansara róp,
tá ið trongd kemur uppá hann?
10 Vil hann fragda sær í hinum
Almáttuga? vil hann altíð kalla
uppá Guð?
11 Eg vil læra tykkum við^
hond Guðs: *tað,* sum *er* hjá hinum Almáttuga, vil ikki eg loyna.

12 Sí, allir tit sjálvir hava sæð *tað;* hví eru tit tá soleiðis aldeilis fáfongdir?

13 Hetta *er* skamturin hjá vondum manni hjá˝ Guði, og arvurin hjá kúgarum, *sum* teir skulu fáa frá hinum Almáttuga.

14 Um hansara børn verði margfaldað, *er tað* til svørðið: og hans avkom skal ei verða mettað við breyði.

15 Teir, sum eru eftir av honum, skulu verða jarðaðir í deyða: og hans einkjur skulu ikki gráta.

16 Hóast hann hópi upp silvur sum dustið, og fyribúgvi klædnað sum leirið;

17 Hann kann fyribúgva *hann,* men hin rættvísi skal fara í *hann,* og hin sakleysi skal skifta *sundur* silvurið.

18 Hann byggir sítt hús sum ein mølur; og sum eina búð, *sum* vørðurin ger.

19 Ríkmaðurin skal leggjast niður, men hann skal ei verða savnaður: hann letur upp eygum sínum, og hann *er* ikki.

20 Ræðslur taka hald á honum sum vøtn, ein ódnarvindur stjelur hann burtur um náttina.

21 Eystanvindurin ber hann burtur, og hann fer avstað: og sum ein stormur sleingir hann úr hansara plássi.

22 Tí at *Guð* skal kasta omanyvir hann, og ikki eira: hann vildi fegin flýggjað út úr hans hond.

23 *Menn* skulu klappa sínar hendur eftir honum, og skulu fisa hann út úr hans plássi.

KAPITUL 28

VISSULIGA, ein æðr er til silvurið; og eitt pláss til gull, *har* teir edla *tað*.

2 Jarn verður tikið úr jørðini, og messing *verður* brætt *burtur úr* steininum.

3 Hann setur ein enda fyri myrkri, og grundar út allan fullkominleika: myrkursins steinar, og skugga deyðans.

4 Flóðin brýtur út frá íbúgvanum; *enntá vøtnini,* gloymd av fótinum: tey eru turkaði upp, tey eru farin burtur frá monnum.

5 *Hvat viðvíkur* jørðini, burtur úr henni kemur breyð: og undir henni er vendur upp sum var tað eldur.

6 Hennara steinar *eru* plássið hjá sapphīrum: og hon hevur støv av gulli.

7 *Til er* ein rás, sum eingin fuglur kennir, og sum eygað hjá gamminum ei hevur sæð:

8 Leyvunnar hvølpar hava ikki traðkað hana, ella hin grimma leyva ferðast um hana.

9 Hann setur fram sína hond uppá klettin; hann hvølvir fjøllunum eftir rótunum.

10 Hann sker út áir millum klettanna; og hans eyga sær hvørt dýrabært ting.

11 Hann bindur flóðirnar frá at floyma yvir; og *tað ting, sum er* fjalt, førir hann fram til ljóss.

12 Men hvar skal vísdómur verða funnin? og hvar *er* plássið hjá skili?

13 Maður veit ikki prísin hará; eiheldur verður hann funnin í landi teirra livandi.

14 Dýpdin sigur, Hann *er* ikki í mær: og sjógvurin sigur, *Hann er* ikki hjá mær.

15 Hann kann ei verða fingin fyri gull, eiheldur skal silvur verða vigað *fyri* prísin hará.

16 Hann kann ei verða mettur við gullið úr Ō´-phīr, við hin dýrabæra ónyks, ella sapphīrin.

17 Gullið og krystallið kunnu ikki javnast *við* hann: og skiftingin um av honum *skal ei vera fyri* smúkkur av fínum gulli.

18 Einkið skal verða nevnt um korall, ella um perlur: tí at prísurin á vísdómi *er* omanfyri rubīnar.

19 Tōpazin úr Ê-thī-ō´-pī-u skal

ikki javnast *við* hann, eiheldur skal hann verða mettur við skírt gull.
20 Hvaðan kemur tá vísdómur? og hvar *er* plássið hjá skili?
21 Við tað at hann er fjaldur frá eygunum á øllum livandi, og hildin loyndur frá fuglum luftarinnar.
22 Oyðing og deyði siga, Vit hava hoyrt hansara giti við oyrum okkara.
23 Guð skilur vegin harhjá, og hann veit plássið harhjá.
24 Tí hann lítur til jarðarinnar endar, *og* sær undir hin heila himin;
25 At gera vektina til vindarnar; og hann vigar vøtnini eftir máti.
26 Tá ið hann gjørdi eina løgskipan til regnið, og ein veg til snarljós torunnar:
27 Tá sá hann hann, og kunngjørdi hann; hann fyribúði hann, ja, og grundaði hann út.
28 Og við mann segði hann, Sí, Ótti Harrans, tað *er* vísdómur; og at víkja frá illum *er* skil.

KAPITUL 29

JOB harafturat helt áfram sína dømisøgu, og segði,
2 Á, at eg var sum *í* umlidnum mánaðum, sum *í* døgunum *tá ið* Guð varðveitti meg;
3 Tá ið hansara kerti skein uppiá mínum høvdi, *og tá ið* við hansara ljósi eg gekk *ígjøgnum* myrkur;
4 Eins og eg var í døgum ungdóms míns, tá ið Guðs loyndarmál *var* uppiá mínum tabernakli;
5 Tá ið hin Almáttugi *var* enn hjá mær, *tá ið* míni børn *vóru* um meg;
6 Tá ið eg tváaði míni fet við smøri, og kletturin helti mær út løkir av olju;
7 Tá ið eg fór út til portrið ígjøgnum staðin, *tá ið* eg reiddi mítt sæti í strætinum!
8 Teir ungu menninir sóu meg, og fjaldu seg: og hinir aldraðu reistu *seg, og* stóðu upp.
9 Prinsarnir hildu *sær* aftur *frá* at tala, og løgdu *sína* hond á sín munn.
10 Tignarmenninir hildu friði sínum, og teirra tunga krøktist til góman á munni teirra.
11 Tá ið oyrað hoyrdi *meg,* tá vælsignaði tað meg; og tá ið eygað sá *meg,* gav tað vitnisburð til mín:
12 Av tí at eg bjargaði tí fátæka sum rópti, og tí faðirleysa, og *honum sum* ongan *hevði* at hjálpa sær.
13 Signing hansara, sum var um at farast, kom uppá meg: og eg voldi einkjunnar hjarta at syngja av frøi.
14 Eg læt *meg* í rættvísi, og hon klæddi meg: mín dómur *var* sum ein skikkja og eitt ennisprýði.
15 Eg var eygu fyri tí blinda, og føtur eg *var* fyri tí lamna.
16 Eg *var* ein faðir fyri hinum fátøku: og ta søk, *sum* eg ei kendi, grundaði eg út.
17 Og eg breyt kinnabeinini hjá hinum vonda, og sleit fongin úr hansara tonnum.
18 Tá segði eg, Eg skal doyggja í mínum reiðri, og eg skal margfalda *mínar* dagar sum sandin.
19 Mín rót *var* breidd út hjá vøtnunum, og døggin lá alla nátt uppiá míni grein.
20 Mín dýrd *var* fersk í mær, og mín bogi varð endurnýggjaður í míni hond.
21 *Menn* læntu mær oyra, og bíðaðu, og hildu tøgn við mítt ráð.
22 Aftaná míni orð, teir talaðu ikki aftur; og mín tala dreyp uppá teir.
23 Og teir bíðaðu eftir mær sum eftir regninum; og teir lótu upp munn sín víðan, *sum* eftir tí seinna regninum.

24 *Um* eg læði á teir, teir trúðu *tí* ei; og ljósið av míni ásjón teir kastaðu ikki niður.

25 Eg valdi út teirra veg, og sat hægstur, og búði sum ein kongur í herinum, sum ēin *sum* uggar harmararnar.

KAPITUL 30

MEN nú, *teir sum eru* yngri enn eg, halda meg fyri gjøldur, hvørs fedrar eg vildi havt vanvirt at havt sett hjá hundum smáfæafylgis míns.

2 Ja, til hvat *kundi* styrkin av teirra hondum *gagnað* mær, í hvørjum gamalur aldur var gingin undir?

3 Vegna trot og hungursneyð *vóru teir* ēinligir; flýggjandi inn í oyðuna — fyrr í tið*ini* óbygd og oyðin.

4 Hvørjir skóru upp kattostar við runnarnar, og einiberjalyngsrøtur *til* mat sín.

5 Teir vórðu riknir út *manna* millum ífrá, (teir rópaðu eftir teimum sum *eftir* einum tjóvi;)

6 Til at dvøljast í skorunum av dølunum, *í* hellum av jørðini, og *í* klettunum.

7 Teir skrenjaðu runnanna millum; undir notunum vórðu teir savnaðir saman.

8 *Teir vóru* børn hjá dárum, ja, børn hjá niðarligum monnum: teir vóru ringari enn jørðin.

9 Og nú eri eg teirra sangur, ja, eg eri teirra speiorð.

10 Teim stendst við meg, teir flýggja fjart frá mær, og spara ikki at spýta í mítt andlit.

11 Av tí at hann hevur loyst mítt band, og nívt meg, hava teir eisini latið leyst boygslið frammi fyri mær.

12 Við *mína* høgru *hond* rísa unglingarnir; teir trýsta burt mínar føtur, og teir reisa upp ímóti mær vegirnar av síni oyðing.

13 Teir skemma mína rás, teir fremja mín skaða, teir hava ongan hjálpara.

14 Teir komu *uppá meg* sum ein víð bróting inn *av vøtnum:* í oyðingini rullaðu teir seg *uppá meg.*

15 Ræðslur eru vendar uppá meg: tær elta mína sál sum vindurin: og mín vælferð ferðast avstað sum eitt skýggj.

16 Og nú er mín sál helt út uppá meg; dagarnir av nívd hava tikið hald uppá meg.

17 Míni bein verða gataði í mær í náttartíðini: og mínar sinar taka onga hvíld.

18 Við hini miklu kraft *av mínum sjúkdómi* er klæði mítt broytt: tað bindur meg íkring sum kragin á kyrtli mínum.

19 Hann hevur kastað meg inn í mýruna, og eg eri vorðin líka *sum* støv og øskur.

20 Eg geyli á teg, og tú hoyrirt meg ei: eg standi upp, og tú gevurt *ikki* gætur eftir mær.

21 Tú ert vorðin grimmur fyri mær: við tíni sterku hond tú seturt teg ímóti mær.

22 Tú lyftirt meg upp til vindin; tú veldurt mær at ríða *uppiá honum,* og loysirt upp mítt evni.

23 Tí at eg veit, *at* tú vilt føra meg *til* deyða; og *til* húsið — útpeikað til øll livandi.

24 Hvussu enn er, hann vil ikki rætta út *sína* hond til grøvina, tó *at* teir geyli í hans oyðing.

25 Grætt eg ikki um hann sum var í trongd? var *ikki* mín sál hørm um hin fátæka?

26 Tá ið eg væntaði eftir góðum, tá kom ilt *at mær:* og tá ið eg bíðaði eftir ljósi, kom myrkur.

27 Mínir innvølir kókaðu, og hvíldu ikki: dagarnir av nívd komu mær á møti.

28 Eg fór harmandi uttan sólina: eg stóð upp, *og* eg rópaði í samkomuni.

29 Eg eri ein bróðir hjá drekum, og ein felagi hjá uglum.
30 Mín húð er svørt uppiá mær, og míni bein eru brend við hita.
31 Mín harpa eisini er *vend* til venan; og mítt blásturs-ljóðføri í røddina hjá teimum ið gráta.

KAPITUL 31

EG gjørdi ein sáttmála við míni eygu; hví skuldi eg tá tonkt uppá eina moyggj?
2 Tí at hvør skamtur Guðs *er* oman ífrá? og *hvør* arvur hins Almáttuga frá í hæddini?
3 *Er* ikki oyðing til hin vonda? og ein undarlig *revsing* til gerningsmenninar av misgerð?
4 Sær ikki hann mínar vegir, og telur øll míni fet?
5 Um eg havi gingið við fáfongd, ella um mín fótur hevur kvikað til svik;
6 Lat meg verða vigaðan í eini javnari vágskál, at Guð má vita mín heilleika.
7 Um mítt fet hevur vent út av veginum, og mítt hjarta gingið eftir eygum mínum, og um nakar blettur hevur krøkt *seg* til hendur mínar;
8 *Tá* lat meg sáa, og lat ein annan eta; ja, lat mítt avkom verða *rykt* upp við rót.
9 Um mítt hjarta havi verðið tølað av eini kvinnu, ella *um* eg havi ligið *á* lúr við hurð næsta míns;
10 *Tá* lat mína konu mala hjá einum øðrum, og lat aðrar boyggja *seg* niður uppá hana.
11 Tí at hetta *er* eitt ótespiligt brotsverk; ja, tað *er* ein misgerð *til at verða revsað av* dómarunum.
12 Tí at tað *er* ein eldur *sum* upptærir til oyðing, og vildi *rykt* upp *við* rót allan mín gróður.
13 Um eg vanvirdi søkina hjá mínum tænastusveini, ella hjá míni tænastumoyggj, tá ið tey trættu við meg;
14 Hvat skal eg tá gera, tá ið Guð rísur upp? og tá ið hann heimsøkir, hvat skal eg svara honum?
15 Gjørdi ikki hann, sum gjørdi meg í móðurlívinum, hann? og snikkaði ikki ein okkum í móðurlívinum?
16 Um eg havi afturhildið hini fátæku frá *teirra* trá, ella havi volt einkjunnar eygum at bila;
17 Ella havi etið mín bita sjálvur aleinaur, og hin faðirleysi hevur ikki etið harav;
18 (Tí at frá mínum ungdómi varð hann aldur upp við mær, sum *hjá* einum faðiri, og eg havi vegleitt henni frá móðurlívi móður mínar;)
19 Um eg havi sæð nakran farast fyri trot á klædnað, ella nakran fátækan uttan dekking;
20 Um hansara lendar havi ikki signað meg, og *um* hann varð *ikki* vermdur við ullarskinninum av mínum seyði;
21 Um eg havi lyft upp mína hond ímóti tí faðirleysa, tá ið eg sá mína hjálp í portrinum:
22 *Tá* lat arm mín falla frá akslablaði mínum, og mín arm verða brotnan frá beininum.
23 Tí at oyðing *frá* Guði *var* ein ræðsla hjá mær, og uppá grund av hans hásemi kundi eg ikki halda út.
24 Um eg havi gjørt gull *til* mína vón, ella havi sagt til tað fína gullið, *Tú ert* mítt álit;
25 Um eg fegnaðist av tí at mítt ríkidømi *var* mikið, og av tí at mín hond hevði fingið nógv;
26 Um eg skoðaði sólina, tá ið hon skein; ella mánan, gangandi *í* bjartleika;
27 Og mítt hjarta hevur loyniliga verðið lokkað, ella mín muður hevur kyst mína hond:
28 Hetta eisini *hevði verið* ein misgerð *til at verða revsað av* dómaranum: tí at eg hevði havt

avnoktað tann Guð *sum er* í erva.
29 Um eg fegnaðist við oyðing hansara sum hataði meg; ella lyfti upp meg sjálvan, tá ið ilt fann hann:
30 Eiheldur havi eg loyvt mínum munni at synda, við at ynskja eina banning til hansara sál.
31 Um menninir av mínum tabernakli ikki søgdu, Á, at vit høvdu av hansara kjøti! vit kunnu ei verða nøktaðir.
32 Hin fremmandi helt ikki til í gøtuni: *men* eg opnaði mínar dyr fyri ferða*mann*inum.
33 Um eg dekkaði míni misbrot sum Adam, við at fjala mína misgerð í mínum barmi:
34 Óttaðist eg eina mikla mannfjøld, ella ræðslusló vanvirðingin av familjum meg, at eg helt tøgn, *og* fór ikki út um hurðina?
35 Á, at ēin vildi hoyrt meg! sí, mín trá *er, at* hin Almáttugi vildi svarað mær, og *at* mín mótstandari hevði skrivað eina bók.
36 Vissuliga vildi eg tikið hana uppá mína øksl, *og* bundið hana *sum* eina krúnu til mín.
37 Eg vildi kunngjørt honum talið á mínum fetum; sum ein prinsur vildi eg farið nær honum.
38 Um mítt land geyli ímóti mær, ella at foyrurnar líkaleiðis harhjá klagi;
39 Um eg havi etið tess ávøkstir uttan pening, ella havi volt ánarum tess at missa sítt lív:
40 Lat tistlar vaksa ístaðin fyri hveiti, og illgresi ístaðin fyri bygg. Orðini hjá Job eru endað.

KAPITUL 32

SO hesir tríggir menninir góvust at svara Job, av tí at hann *var* rættvísur í sínum egnu eygum.
2 Tá varð kynd vreiðin hjá Ē′lī-hū Bă-rā′-chĕl-s syni Bū-zīt′-a, av ættarfólki Ráms: ímóti Job varð hansara vreiði kynd, av tí at hann rættvísgjørdi seg sjálvan, heldur enn Guð.
3 Eisini ímóti sínum trimum vinum varð hansara vreiði kynd, av tí at teir einkið svar høvdu funnið, og *tó* høvdu fordømt Job.
4 Nú, Ē′-lī-hū hevði bíðað til Job hevði talað, av tí at teir *vóru* eldri enn hann.
5 Tá ið Ē′-lī-hū sá, at *har var* einkið svar í munninum hjá *hesum* trimum monnunum, tá varð hansara vreiði kynd.
6 Og Ē′-lī-hū Bă-rā′-chĕl-s sonur Bū-zīt′-i tók til máls og segði, Eg *eri* ungur, og tit *eru* sera gamlir; hvørsvegna eg var ræddur, og tordi ei sýna tykkum mína meining.
7 Eg segði, Dagar skuldu talað, og fjøld av árum skuldi frálært vísdóm.
8 Men *tað er* ein andi í manni: og íblástur hins Almáttuga gevur teimum skil.
9 Miklir menn eru ikki *altíð* vísir: eiheldur skilja hinir aldraðu dóm.
10 Tí segði eg, Lurtið eftir mær; eg eisini vil sýna mína meining.
11 Sí, eg bíðaði eftir orðum tykkara; eg lænti oyra til tykkara grundir, meðan tit grundaðu út hvat *tit áttu* at siga.
12 Ja, eg gáaði at tykkum, og sí, *tað var* eingin av tykkum sum sannførdi Job, *ella* sum svaraði hans orðum:
13 At ikki tit skuldu siga, Vit hava funnið útav vísdómi: Guð stoytir hann niður, ikki maður.
14 Nú, hann hevur ikki beint *sínum* orðum ímóti mær: eiheldur vil eg svara honum við tykkara talum.
15 Teir vórðu ógvaðir, teir svaraðu ei meira: teir lótu av at tala.
16 Tá ið eg hevði bíðað, (tí at teir talaðu ikki, men stóðu stillir, *og* svaraðu ei meira;)
17 *Segði eg,* Eg vil svara eisini

mín part, eg eisini vil sýna mína meining.
18 Tí at eg eri fullur av málevni, andin innan í mær tvingar meg.
19 Sí, mín kviður *er* sum vín, *sum* einkið útlát hevur; hann er um at bresta sum nýggir kíkar.
20 Eg vil tala, at eg má verða endurfrískaður: eg vil lata upp mínar varrar og svara.
21 Latið meg ikki, eg biði tykkum, taka ímóti persóni nakars mans, eiheldur latið meg geva smikrandi titlar at manni.
22 Tí at eg dugi ikki at geva smikrandi titlar; *í so at gjørt,* vildi mín skapari skjótt tikið meg burt.

KAPITUL 33

HVØRSVEGNA, Job, eg biði teg, hoyr talur mínar, og lurta eftir øllum orðum mínum.
2 Sí, nú havi eg latið upp munn mín, mín tunga hevur talað í munni mínum.
3 Míni orð *skulu vera av* reiðiligleikanum av mínum hjarta: og mínar varrar skulu mæla kunnleika klárliga.
4 Guðs Andi hevur gjørt meg, og andadráttur hins Almáttuga hevur givið mær lív.
5 Um tú kanst svara mær, legg til rættis *tíni orð* frammi fyri mær, statt upp.
6 Sí, eg *eri* samsvarandi við títt ynski í Guðs stað: eg eisini eri myndaður burtur úr leirinum.
7 Sí, mín ræðsla skal ei gera teg ræddan, eiheldur skal hond mín vera tung uppiá tær.
8 Vissuliga hevurt tú talað í míni áhoyrn, og eg havi hoyrt røddina av orðum *tínum, sigandi,*
9 Eg eri reinur uttan misbrot, eg *eri* sakleysur; eiheldur *er* misgerð í mær.
10 Sí, hann finnur tilevnir ímóti mær, hann roknar meg sum sín fígginda,
11 Hann setur mínar føtur í stokkin, hann *býtur* merki *við* allar mínar gøtur.
12 Sí, *í* hesum ert tú ikki rættlátur: eg vil svara tær, at Guð er størri enn maður.
13 Hví stríðirst tú ímóti honum? tí at hann gevur ikki roknskap um nøkur av málum sínum.
14 Tí at Guð talar ēina ferð, ja, tvær ferðir, *maður tó* varnast tað ei.
15 Í einum dreymi, í eini náttarsjón, tá ið djúpur svøvnur fellur uppá menn, í slumringum uppiá seingini;
16 Tá opnar hann oyruni hjá monnum, og siglar *inn* teirra leiðbeining,
17 At hann má aftra mann *frá hans* ætlan, og fjala hugmóð frá manni.
18 Hann heldur aftur hansara sál frá holuni, og hansara lív frá at farast við˙ svørðinum.
19 Hann verður agaður eisini við pínu uppiá song síni, og fjøldin av hansara beinum við sterkari *pínu:*
20 So at hansara lívi stendst við breyð, og hansara sál við dámligan mat.
21 Hansara kjøt verður tært burtur, at tað kann ikki síggjast; og hansara bein, *sum* sóust ikki, stinga út.
22 Ja, hansara sál nærkast at grøvini, og hansara lív til oyðaranna.
23 Um tað veri ein sendiboði hjá honum, ein týðari, ēin millum túsund, at sýna manni hansara reiðiligsemi:
24 Tá er hann náðisamur at honum, og sigur, Útfría hann frá at fara niður til holuna: eg havi funnið eitt loysigjald.
25 Hansara kjøt skal verða frískari enn hjá einum barni: hann skal venda aftur til dagarnar av sínum ungdómi:
26 Hann skal biðja til Guðs, og hann vil vera góðvildarsamur at honum: og hann skal sjá hans

andlit við frøi: tí at hann vil rinda manni hansara rættvísi.
27 Hann hyggur uppá menn, og *um nakar* sigi, Eg havi syndað, og spilt *tað sum* rætt *var,* og tað gagnaði mær ikki;
28 Hann vil bjarga hansara sál frá at fara inn í holuna, og hansara lív skal sjá ljósið.
29 Sí, øll hesi *ting* virkar Guð mangan hjá manni,
30 At føra tilbakar hansara sál frá holuni, at verða upplýsnaður við ljósi teirra livandi.
31 *Legg* væl *til* merkis, O Job, lýð á meg: halt friði tínum, og eg vil tala.
32 Um tú hevurt nakað ting at siga, svara mær: tala, tí eg trái at rættvísgera teg.
33 Um ikki, lýð á meg: halt friði tínum, og eg skal læra teg vísdóm.

KAPITUL 34

HARAFTURAT svaraði Ē-lĭ-hū og segði,
2 Hoyrið míni orð, O tit vísu *menn;* og lænið oyra at mær, tit sum hava kunnleika.
3 Tí at oyrað roynir orŏ, eins og muðurin bragdar mat.
4 Latum okkum velja fyri okkum dóm: latum okkum vita okkara millum hvat *er* gott.
5 Tí at Job hevur sagt, Eg eri rættvísur: og Guð hevur tikið burtur mín dóm.
6 Skuldi eg logið ímóti rætti mínum? mítt sár *er* ólekiligt uttan misbrot.
7 Hvør maður *er* líka *sum* Job, *sum* drekkur upp háðan sum vatn?
8 Sum fer í samlag við misgerðar-virkararnar, og gongur við vondum monnum.
9 Tí at hann hevur sagt, Tað gagnar einum manni einkið, at hann skuldi fragdað sær hjá Guði.
10 Tessvegna lýðið á meg, tit skilamenn: fjart veri tað frá Guði, *at hann skuldi gjørt* vondsku; og *frá* hinum Almáttuga, *at hann skuldi framt* misgerð.
11 Tí at verkið hjá einum manni skal hann rinda at honum, og elva hvørjum manni at finna samsvarandi við *sínar* vegir.
12 Ja vissuliga, Guð vil ei gera vondliga, eiheldur vil hin Almáttugi spilla dóm.
13 Hvør hevur givið honum eina álegging yvir jørðini? ella hvør hevur skipað allan heimin?
14 Um hann seti sítt hjarta uppá mann, *um* hann savni at sær sín anda og sín andadrátt;
15 Skal alt kjøt farast tilsaman, og maður skal venda aftur at støvi.
16 Um nú *tú hevurt* skil, hoyr hetta: lurta eftir røddini á mínum orðum.
17 Skal enntá hann, sum hatar rætt, stjórna? og vilt tú fordøma hann sum er mest rættlátur?
18 *Er tað hóskiligt* at siga til ein kong, *Tú ert* vondur? *og* til prinsar, *Tit eru* ógudiligir?
19 *Hvør mikið minni til hansara* sum ikki góðtekur persónar prinsa, ella metur hin ríka meir enn hin fátæka? tí at teir allir *eru* verk handa hans.
20 Í einum eygnabragdi skulu teir doyggja, og fólkið skal verða trongt á midnátt, og ganga undir: og hinir mektigu skulu verða tiknir burt uttan hond.
21 Tí hans eygu *eru* uppá vegir mans, og hann sær allar gongur hans.
22 *Tað finst* einkið myrkur, ella deyðsskuggi, har misgerðar-virkararnir mega fjala seg.
23 Tí hann vil ikki leggja uppá mann meiri *enn rætt;* at hann skuldi innfarið inn í dóm við Guð.
24 Hann skal bróta í stykkir mektigar menn uttan tal, og seta aðrar í teirra stað.
25 Tí kennir hann teirra verk,

og hann hvølvir *teimum* um náttina, so at teir verða oyddir.
26 Hann berjir teir sum vondar menn í hini opnu eygsjón annara;
27 Av tí at teir vendu tilbakar frá honum, og vildu ikki hugleiða nakrar av hansara vegum:
28 So at teir volda rópi hins fátæka at koma at honum, og hann hoyrir róp teirra nívdu.
29 Tá ið hann gevur kvirru, hvør kann tá gera trongd? og tá ið hann fjalir *sítt* andlit, hvør kann tá skoða hann? hvørt *tað verði gjørt* ímóti eini tjóð, ella ímóti einum manni einans:
30 At hyklarin ríki ei, at ikki fólkið verði snerrað.
31 Vissuliga, tað er hóskiligt at verða sagt við Guð, Eg havi borið *aga,* eg vil ei *volda* meinboga *meira:*
32 *Tað, sum* eg ei síggi, læri tú meg: um eg havi gjørt misgerð, eg vil gera ei meira.
33 *Skuldi tað verið* samsvarandi við huga tín? hann vil endurgjalda tað, hvørt tú sýti, ella hvørt tú velji; og ikki eg: tessvegna tala tað *sum* tú veitst.
34 Lat skilamenn siga mær, og lat ein vísan mann lýða á meg.
35 Job hevur talað uttan kunnleika, og hans orð *vóru* uttan vísdóm.
36 Trá mín *er, at* Job má verða royndur *fram*at endanum, orsakað av *hansara* svarum fyri vondar menn.
37 Tí at hann leggur uppreist afturat síni synd, hann klappar *sínar hendur* okkara millum, og margfaldar síni orð ímóti Guði.

KAPITUL 35

ELĬHŪ talaði harafturat, og segði,
2 Heldurt tú hetta at vera rætt, *at* tú segðirt, Mín rættvísi *er* meiri enn Guðs?
3 Tí at tú segðirt, Hvør fyrimunur vil tað vera hjá tær? *og,* Hvat gagn skal eg hava, *um eg verði reinsaður* frá míni synd?
4 Eg vil svara tær, og tínum felagum við tær.
5 Hygg *upp* at himnunum, og síggj; og sí skýggini, *sum* eru hægri enn tú.
6 Um tú syndart, hvat gert tú ímóti honum? ella *um* tínar misgerðir verði margfaldaðar, hvat gert tú honum?
7 Um tú veri *teg* rættvísur, hvat gevurt tú honum? ella hvat tekur hann við av tíni hond?
8 Tín vondska *kann skaða* ein mann sum tú *ert;* og tín rættvísi *kann gagna* manssyninum.
9 Uppá grund av fjøldini av kúganum, fáa teir *hinar kúgaðu* at geyla: teir geyla út uppá grund av armi hinna mektigu.
10 Men eingin sigur, Hvar *er* Guð mín skapari, sum gevur sangir um náttina;
11 Sum lærir okkum meiri enn djór˘ jarðarinnar, og ger okkum vísari enn fuglar himins?
12 Har rópa teir, men eingin gevur svar, orsakað av hugmóðini hjá óndum monnum.
13 Vissuliga, Guð vil ikki hoyra fáfongd, eiheldur vil hin Almáttugi geva far eftir tí.
14 Hóast tú sigurt, *at* tú skalt ei síggja hann, *tó er* dómur frammi fyri honum; tí troysti tú á hann.
15 Men nú, av tí at *tað er* ikki *soleiðis,* hevur hann heimsókt í síni øði; tó kennir hann *tað* ikki í miklum uttarligleika:
16 Tí opnar Job sín munn í fáfongd; hann margfaldar orð˘ uttan kunnleika.

KAPITUL 36

ELĬHŪ eisini helt áfram, og segði,
2 Tol meg eitt sindur, og eg vil sýna tær, at *eg eigi* enn at tala Guðs vegna.

3 Eg vil heinta mín kunnleika fjarvegis frá, og vil tilskriva rættvísi til Skapara mín.
4 Tí at sanniliga, míni orð *skulu* ikki *vera* følsk: hann, sum er fullkomin í kunnleika, *er* hjá tær.
5 Sí, Guð *er* mektigur, og vanvirðir ikki *nakran: hann er* mektigur í styrki *og* vísdómi.
6 Hann varðveitir ikki lív hins vonda: men gevur rætt til hinna fátæku.
7 Hann dregur ikki aftur síni eygu frá tí rættvísa: men hjá kongum *tey eru* á hásætið; ja, hann grundfestir teir um ævir, og teir verða upphevjaðir.
8 Og um *teir verði* bundnir í fjøtrum, *og* verði hildnir í nívdarbondum;
9 Tá sýnir hann teirra verk, og teirra misbrotˇ sum teir hava framumgingið.
10 Hann opnar eisini teirra oyra fyri aga; og ábýður, at teir vendi aftur frá misgerð.
11 Um teir *hann* lýði og tæni, skulu teir brúka sínar dagar í framgongd, og síni ár í njótingum.
12 Men um teir lýði ei, skulu teir týnast við svørðinum, og teir skulu doyggja uttan kunnleika.
13 Men hyklararnir í hjarta hópa upp vreiði: teir rópa ikki tá ið hann bindur teir.
14 Teir doyggja í ungdómi, og teirra lív *er* hinna óreinu millum.
15 Hann bjargar tí fátæka í hansara nívd, og letur upp teirra oyru í kúgan.
16 Júst soleiðis vildi hann havt burtflutt teg út úr trong*støð*uni *inn í* eitt breitt pláss, har eingin trongsemi *er;* og tað, sum hevði verðið sett á títt borð, *hevði verið* fult av fiti.
17 Men tú hevurt uppfylt dóm hins vonda: dómur og rættlæti taka hald *á tær.*
18 Av tí at *tað finst* vreiði, *ver varin,* at ikki hann taki teg burt við *sínum* smekki: tá kann eitt mikið loysigjald ikki útfría teg.
19 Vil hann virða tínar ríkdómar? *nei,* ikki gull, ella allar kreftirnar av styrki.
20 Tráa ikki náttina, tá ið fólk verða skorin av í sínum plássi.
21 Ansa eftir, gev ikki gætur eftir misgerð: tí at hetta hevurt tú valt, heldur enn nívd.
22 Sí, Guð upphevjar viðˆ síni kraft: hvør frálærir líka *sum* hann?
23 Hvør hevur álagt honum hansara veg? ella hvør kann siga, Tú hevurt virkað misgerð?
24 Minst til, at tú stórgeri hansara verk, sum menn skoða.
25 Hvør maður kann sjá tað; maður kann eygleiða *tað* fjarvegis frá.
26 Sí, Guð *er* mikil, og vit kenna *hann* ikki, eiheldur kann talið av hansara árum verða grundað út.
27 Tí at hann ger droparnar av vatni smáar: teir hella niður regn samsvarandi við guvuna av tí:
28 Sum skýggini drúpa *og* dropadríva omanyvir mann ríkiliga.
29 Eisini, kann *nakar* fata skýggjanna spreiðingar, *ella* gangin av tabernakli hans?
30 Sí, hann spreiðir sítt ljós uppá tað, og dekkar botnin á sjónum.
31 Tí við teimum hann dømir fólkið; hann gevur mat í ríkiligleika.
32 Við skýggjum hann dekkar ljósið; og býður tí *ikki at skína,* viðˆ *skýgginum* sum kemur ímilli.
33 Gangurin harav sýnir viðvíkjandi tí, fenaðurin eisini viðvíkjandi guvuni.

KAPITUL 37

FYRI hesum eisini mítt hjarta skelvir, og verður flutt úr sínum plássi.

2 Hoyrið gáisligani gangin av hansara rødd; og ljóðið *sum* gongur út úr hans munni.
3 Hann beinir tí undir hinum heila himni, og sítt snarljós at endum jarðarinnar.
4 Eftir tað ýlir ein rødd: hann torar við røddini av síni avbærni; og hann vil ikki steðga teimum, tá ið hans rødd verður hoyrd.
5 Guð torar undranarverdigani við síni rødd; mikil ting hann ger, sum vit kunnu ikki fevna um.
6 Tí hann sigur til kavan, Ver tú *á* jørðini; líkaleiðis til hitt smáa regnið, og til hitt mikla regnið av hansara styrki.
7 Hann innsiglar hendi hvørs mans; at allir menn mega kenna hans verk.
8 Tá fara *vill*djórini inn í hellir, og verða verandi í sínum plássum.
9 Úr sunnan kemur meldurvindurin: og kuldi úr norðan.
10 Við Guðs andadrátti verður frost givið: og breiddin á vøtnunum verður trongd um.
11 Eisini við at vatna møðir hann tað tjúkka skýggið: hann spjaðir sítt bjarta skýggj:
12 Og tað verður vent runt íkring við hans ráðum: at tey mega gera hvatsumhelst *ið* hann ábýður teimum uppiá ásjónini á verøldini á jørðini.
13 Hann elvir tí at koma, hvørt til rættleiðingar, ella til lands síns, ella til miskunnar.
14 Lýð á hetta, O Job: statt stillur, og umhugsa hini undurfullu verk Guðs.
15 Veitst tú nær Guð raðsetti tey, og voldi ljósinum av sínum skýggi at skína?
16 Skilurt tú skýggjanna javnvágir, hini undurfullu verk hans sum er fullkomin í kunnleika?
17 Hvussu tíni klæðir *eru* heit, tá ið hann jørðina kyrrir við sunnan*vindinum?*
18 Hevurt tú við honum breitt út loftið, *sum er* sterkt, *og* sum eitt brætt skoðiglar?
19 Lær okkum hvat vit skulu siga við hann; *tí at* vit kunnu ikki skipa *okkara talu,* orsakað av myrksemi.
20 Skal tað verða sagt honum, at eg tali? um ein maður tali, vissuliga hann skal verða svølgdur upp.
21 Og nú síggja *menn* ikki hitt bjarta ljós, sum í skýggjunum *er:* men vindurin ferðast, og reinsar tey.
22 Vakurt veður kemur úr norðan: hjá Guði *er* ræðulig hátign.
23 *Viðvíkjandi* hinum Almáttuga, vit kunnu ikki finna útav honum: *hann er* avbærur í mátti, og í dómi, og í ríkiligum av rættvísi: hann vil ikki níva.
24 Tí óttast menn hann: hann metir ikki nakrar *sum eru* hjartavísir.

KAPITUL 38

TÁ svaraði HARRIN Job út úr meldurvindinum, og segði,
2 Hvør *er* hesin, sum myrkir ráð við orðum uttan kunnleika?
3 Gyrð *teg* nú um tínar lendar sum ein maður; tí at eg vil krevja av tær, og svara tú mær.
4 Hvar vart tú tá ið eg legði grundvøllir jarðarinnar? kunnger, um tú hevurt skil.
5 Hvør hevur lagt mátini harhjá, um tú veitst? ella hvør hevur spent *máti*linjuna uppá hana?
6 Uppá hvar eru hennara grundvøllir festir? ella hvør legði hennara hornastein;
7 Tá ið morgunstjørnurnar sungu tilsaman, og allir Guðs synir róptu av frøi?
8 Ella *hvør* lokaði inni sjógvin við hurðum, tá ið hann breyt fram, *sum um* hann hevði útrunnið út úr móðurlívinum?
9 Tá ið eg gjørdi skýggið *til*

hansara klæði, og tjúkt myrkur *til* eitt sveipingarband til hansara,
10 Og breyt upp til hansara mítt avrádda *pláss,* og setti lokur og hurðar,
11 Og segði, Higartil skalt tú koma, men ikki longur: og her skulu tínar stoltu aldur verða steðgaðar?
12 Hevurt tú áboðið morgninum síðan dagar tínar; *og* fingið dagglæmuna at kenna sítt pláss;
13 At hon mátti taka hald á endum jarðarinnar, at hinir vondu máttu verða rystir út úr henni?
14 Hon verður broytt sum leir *til* innsiglið; og teir standa sum eitt klæði.
15 Og frá hinum vondu verður teirra ljós hildið aftur, og hin høgi armur skal verða brotin.
16 Hevurt tú innfarið inn í lindir havsins? ella hevurt tú gingið í kanning dýpdarinnar?
17 Hava deyðans portur verðið upplatin tær? ella hevurt tú sæð deyðsskuggans hurðar?
18 Hevurt tú fatað jarðarinnar breidd? kunnger, um tú veitst tað alt.
19 Hvar *er* vegurin *har* ljós býr? og *hvat* myrkri *viðvíkur,* hvar *er* pláss tess,
20 At tú skuldirt tikið tað til mark tess, og at tú skuldirt vitað gøturnar *til* húss tess?
21 Veitst tú *tað,* av tí at tú tá vart føddur? ella *av tí at* talið á tínum døgum *er* stórt?
22 Hevurt tú innfarið inn í skattir kavans? ella hevurt tú sæð skattir heglsins,
23 Sum eg havi lagt burturav ímót tíðini av trongd, ímót deginum av bardaga og kríggi?
24 Við hvønn veg verður ljósið deilt, *sum* spjaðir eystanvindin uppá jørðina?
25 Hvør hevur deilt eina vatnkós til yvirfloymingina av vøtnum, ella ein veg til snarljósið av toru;
26 At elva tí at regna á jørðina, *har* eingin maður *er; á* oyðuna, í hvørji eingin maður *er;*
27 At nøkta tað reyn*sama* og oydna *lendi;* og at volda blómuni hjá hini bleytu urt at spretta fram?
28 Hevur regnið ein faðir? ella hvør hevur gitið droparnar av døggi?
29 Út úr hvørs lívmóður kom ísurin? og hitt rímfrostiga frost himins, hvør hevur alið tað?
30 Vøtnini eru fjald sum *við* einum steini, og ásjónin á djúpinum er fryst.
31 Kanst tú binda hinar søtu ávirkanir Plēi-ă´-dēs-ar, ella loysa Ō´-rī-ŏn-s bond?
32 Kanst tú føra fram Măzz´-ă-rōth í hansara tíð? ella kanst tú leiða Ârc´-tū-rūs við sonum hansara?
33 Kennirt tú regluskipanir himins? kanst tú seta tess harradømi á jørðini?
34 Kanst tú hevja upp tína rødd til skýggini, at ríkiligleiki av vøtnum mega hylja teg?
35 Kanst tú senda snarljós˘, at tey mega fara, og siga við teg, Her *eru* vit?
36 Hvør hevur koyrt vísdóm í hinar innvortis partar? ella hvør hevur givið skil til hjartað?
37 Hvør kann telja skýggini í vísdómi? ella hvør kann helma kíkum himins,
38 Tá ið dustið veksur yvirí harðsemi, og bøklarnir krøkjast fast saman?
39 Vilt tú veiða bráðina til leyvuna? ella metta matarlystin hjá teimum ungu leyvunum,
40 Tá ið tær slanga *sær* í *sínum* hellum, *og* steðga í skýlinum til at liggja á lúri?
41 Hvør útvegar til ravnin hansara mat? tá ið hinir ungu hansara rópa á Guð, teir reika vegna trot á mati.

KAPITUL 39

VEITST tú tíðina tá ið klettarins villgeitir bera fram? *ella* kanst tú merkja *tær* nær hindirnar kálva?

2 Kanst tú upptelja mánaðirnar *sum* tær uppfylla? ella veitst tú tíðina tá ið tær bera fram?

3 Tær boyggja seg, tær bera fram hinar ungu sínar, tær kasta út sorgir sínar.

4 Hinir ungu teirra eru í góðum trivnaði, teir vaksa upp við korni; teir fara fram, og venda ikki aftur at teimum.

5 Hvør hevur sent út villasnan frían? ella hvør hevur loyst villasnans bond?

6 *Til* hvørs hús eg havi gjørt oyðuna, og tað ófruktbæra landið hansara bústaðir.

7 Hann háðar staðarins fjøld, eiheldur gevur hann gætur eftir rakstrar*mans*ins geylan.

8 Fjallanna umráði *er* hansara beiti, og hann sóknast eftir hvørjum grønum tingi.

9 Vil ēinhyrningurin vera villigur at tæna tær, ella verða við krubbu tína?

10 Kanst tú binda ēinhyrningin við hansara bandi í foyruni? ella vil hann harva dalarnar eftir tær?

11 Vilt tú líta á hann, av tí at hansara styrki *er* mikil? ella vilt tú eftirlata títt strev til hansara?

12 Vilt tú trúgva honum, at hann vilji føra heim títt sáð, og savna *tað inn í* løðu tína?

13 *Gavst tú* páfuglunum teir frálíku veingirnar? ella strutsinum veingir og fjaðrar?

14 Sum eftirletur síni egg í jørðini, og vermir tey í støvi,

15 Og gloymir, at fóturin kann knúsa tey, ella at tað villa djórið kann bróta tey.

16 Hann er herdur ímóti hinum ungu sínum, sum um *teir vóru* ikki hansara: hansara strev er í fáfongd uttan ótta;

17 Av tí at Guð hevur rænt hann fyri vísdóm, eiheldur hevur hann tillutað skil til hansara.

18 Ta tíð hann lyftir upp seg sjálvan til hæddar, háðar hann hestin og hans reiðmann.

19 Hevurt tú givið hestinum styrki? hevurt tú klætt hansara háls við toru?

20 Kanst tú gera hann ræddan sum eina grashoppu? dýrdin av hansara nasagluggum *er* ræðulig.

21 Hann grópar í dalinum, og fegnast í styrki *síni:* hann fer áfram at møta hinum vápnaðu monnum.

22 Hann háðar eftir ótta, og er ikki ræðslusligin; eiheldur vendir hann tilbakar frá svørðinum.

23 Ørvahúsin skramblar ímóti honum, tað glampandi spjótið og skjøldurin.

24 Hann svølgir lendið við grimd og øði: eiheldur trýr hann, at *tað er* ljóðið av lúðrinum.

25 Hann sigur millum lúðranna, Há, há; og hann luktar bardagan fjarvegis frá, høvuðsmannanna toru, og geylanina.

26 Flýgur heykurin við vísdómi tínum, *og* spennir sínar veingir ímóti suðri?

27 Hevjar ørnin *seg* upp við títt áboð, og ger reiður sítt á hæddini?

28 Hon býr og steðgar á klettinum, uppiá klettarins hamri, og hinum sterka plássi.

29 Haðani frá søkir hon bráðina, *og* hennara eygu skoða langt burturifrá.

30 Hennara ungar eisini súgva upp blóð: og har hinir vignu *eru,* har *er* hon.

KAPITUL 40

HARTIL svaraði HARRIN Job, og segði,

2 Skal hann, sum stríðir við hin Almáttuga, leiðbeina *honum?* hann, sum átalar Guð, lat hann svara tí.

3 ¶ Tá svaraði Job HARRANUM, og segði,

4 Sí, eg eri vánaligur; hvat skal eg svara tær? eg vil leggja mína hond uppá mín munn.

5 Eina ferð havi eg talað; men eg vil ikki svara: ja, tvær ferðir; men eg vil ikki fara longur fram.

6 ¶ Tá svaraði HARRIN Job út úr meldurvindinum, og segði,

7 Gyrð *teg* um tínar lendar nú sum ein maður: eg vil krevja av tær, og kunnger tú mær.

8 Vilt tú eisini ógilda dóm mín? vilt tú dómfella meg, at tú mást verða rættvísur?

9 Hevurt tú ein arm líkasum Guð? ella kanst tú tora við eini rødd líkasum hann?

10 Hyl teg nú *við* hátign og avbærni; og skrýð teg við dýrd og vakurleika.

11 Kasta útum øðina av tíni vreiði: og skoða hvønn tann *sum er* stoltur, og lækka hann.

12 Hygg á hvønn tann *sum er* stoltur, *og* før hann lágt; og traðka niður hinar vondu í teirra plass.

13 Fjal teir í støvinum tilsaman; *og* bint teirra andlit˘ í loyndum.

14 Tá vil eg eisini játta tær, at tín egna høgra hond kann frelsa teg.

15 ¶ Skoða nú bē´-hē-mōth, sum eg gjørdi við tær; hann etur gras sum ein oksi.

16 Sí nú, hansara styrki *er* í hansara lendum, og hansara kraft *er* í nalvanum av hansara búki.

17 Hann flytur sín hala sum eitt sedris*træ:* sinarnar av hansara steinum eru ballaðar saman.

18 Hansara bein *eru sum* sterk stykkir av messing; hansara bein *eru* líka *sum* stengur av jarni.

19 Hann *er* hin fremsti av vegum Guðs: hann, sum gjørdi hann, kann fáa sítt svørð at nærkast *at honum.*

20 Vissuliga, fjøllini bera honum fram føði, har øll markarinnar villdjór spæla.

21 Hann liggur undir hinum skuggutu trøum, í skýlinum av sevinum, og fenum.

22 Tey skuggutu trøini hylja hann *við* sínum skugga; áarløksins pílatrø umringa hann íkring.

23 Sí, hann drekkur upp eina á, *og* skundar *sær* ikki: hann lítur *á,* at hann kann hála upp Jordan inn í sín munn.

24 Hann tekur hana við sínum eygum: *hansara* nøs gatar ígjøgnum snerrur.

KAPITUL 41

KANST tú hála út lē´-vī-ă-thăn við einum húki? ella hansara tungu við einum bandi, *sum* tú sígurt niður?

2 Kanst tú koyra ein húk inn í hansara nøs? ella bora hansara kjálka*bein* ígjøgn við eini torn?

3 Vil hann gera mangar umbøningar at tær? vil hann tala mjúk *orð* innat tær?

4 Vil hann gera ein sáttmála við teg? vilt tú taka hann til ein tænara um ævir?

5 Vilt tú spæla við hann sum *við* ein fugl? ella vilt tú binda hann fyri moyggjar tínar?

6 Skulu lagsbrøðurnir gera eitt veitsluborðhald úr honum? skulu teir luta hann handilsmannanna millum?

7 Kanst tú fylla hans húð við píkaðum jørnum? ella hans høvd við fiskspjótum?

8 Legg tína hond uppá hann, minst til bardagan, ger ei meira.

9 Sí, vónin um hann er í fáfongd: skal ikki *ein* verða kastaður niður, sjálvt við sjónina av honum?

10 Eingin *er so* øgiligur, ið tori ruska hann upp: hvør er tá førur fyri at standa frammi fyri mær?
11 Hvør hevur verið undan mær, at eg skuldi endurgoldið *honum? hvatsumhelst ið er* undir tí heila himni er mítt.
12 Eg vil ikki loyna hansara partar, ella hansara mátt, ella hansara tekkiliga lutfall.
13 Hvør kann avhylja ásjónina á hansara klæði? *ella* hvør kann koma *til hansara* við sínum tvífalda boygsli?
14 Hvør kann opna hurðarnar av hansara andliti? hansara tenn *eru* ræduligar runt umkring.
15 *Hansara* skøl *eru hansara* stoltleiki, lokaði aftur tilsaman, *sum við* einum tøttum innsigli.
16 Ēitt er so nær móti øðrum, at eingin luft kann koma ímillum tey.
17 Tey eru skoytt hvørt til annað, tey hefta saman, at tey kunnu ei verða sundrað.
18 Við hansara nýsingar skínur eitt ljós, og hans eygu *eru* sum eygnalokur morgunsins.
19 Út úr hans munni fara brennandi lampur, *og* neistar av eldi støkka út.
20 Út úr hans nasarholum gongur roykur, sum *út* úr einum sjóðingarpotti, ella stórketli.
21 Hans andadráttur kyndir kol˙, og ein flamma gongur út úr hans munni.
22 Í hansara nakka verður verandi styrki, og sorg verður vend yvirí frøi frammi fyri honum.
23 Fløgurnar av hansara kjøti eru skoyttar saman: tær eru fastar í sær; tær kunnu ei verða fluttar.
24 Hans hjarta er so fast sum ein steinur; ja, so hart sum eitt stykki av hinum niðara *kvarnarsteini.*
25 Tá ið hann reisir seg upp, verða teir mektigu ræddir: orsakað av brótingum skírga teir seg.
26 Svørð hansara, sum leggur eftir honum, kann ikki halda: spjótið, pílurin, ella bróstbrynjan.
27 Hann metir jarn sum strá, *og* messing sum rotnan við˙.
28 Ørvin kann ei fáa hann at flýggja: sleingjusteinar verða skiftir hjá honum yvirí hálm.
29 Pílar verða roknaðir sum hálmur: hann lær eftir rystingini av einum spjóti.
30 Hvassir steinar *eru* undir honum: hann spreiðir hvassar, spískaðar lutir uppá móruna.
31 Hann fær djúpið at sjóða sum ein pott: hann ger sjógvin sum ein pott av salvu.
32 Hann fær eina rás at skína aftaná sær; *ēin* vildi hildið djúpið *at verið* gráhárut.
33 Uppiá jørð er tað ikki hans líka, sum er gjørdur uttan ótta.
34 Hann skoðar øll høg *ting:* hann *er* ein kongur yvir øllum hugmóðar børnum.

KAPITUL 42

TÁ svaraði Job HARRANUM, og segði,
2 Eg veit, at tú kanst gera hvørt *eitt ting,* og *at* eingin hugsan kann verða hildin aftur frá tær.
3 Hvør *er* hann sum fjalir ráð uttan kunnleika? tí havi eg mælt tað eg skilti ikki; ting ov undurfull hjá mær, sum eg vitsti ikki.
4 Hoyr, eg bøni teg, og eg vil tala: eg vil krevja av tær, og kunnger tú mær.
5 Eg havi hoyrt um teg við^ hoyrnini av oyranum: men nú sær eyga mítt teg.
6 Hvørsvegna mær stendst við *meg sjálvan,* og vendi um í støvi og øskum.
7 ¶ Og tað varð *soleiðis,* at eftir *at* HARRIN hevði talað hesi orðini við Job, segði HARRIN til Ē˙lī-p̲hăz Tê-măn-īt˙-a, Mín vreiði er kynd ímóti tær, og ímóti vinum

tínum tveim: tí at tit hava ikki talað um meg *tað ting sum er* rætt, líka *sum* tænari mín Job *hevur*.

8 Takið tí at tykkum nú sjey ungtarvar og sjey veðrar, og farið til tænara míns Jobs, og ofrið upp fyri tykkum sjálvar eitt brenni-offur; og tænari mín Job skal biðja fyri tykkum: tí honum vil eg taka ímóti: at ikki eg fari við tykkum *eftir* dárskapi *tykkara,* í at tit hava ikki talað um meg *tað ting sum er* rætt, líka *sum* tænari mín Job.

9 So Ē´-lĭ-phăz Tê-măn-ĭt´-i og Bildad Sjū-hĭt´-i *og* Zŏ´-phâr Ná-ăm-ă-thĭt´-i fóru, og gjørdu samsvarandi sum HARRIN ábjóðaði teimum: HARRIN eisini tók ímóti Job.

10 Og HARRIN vendi fangaskapi Jobs, tá ið hann bað fyri vinum sínum: HARRIN eisini gav Jobi tvær ferðir so nógv sum hann hevði áður.

11 Tá komu tað at honum allir brøður hansara, og allar systrar hansara, og øll tey sum høvdu verið av hansara kennskapi frammanundan, og ótu breyð við honum í húsi hansara: og tey harmaðu hann, og uggaðu hann yvir alt tað illa sum HARRIN hevði ført uppá hann: hvør maður eisini gav honum eitt stykki av peningi, og hvør *og* ēin ein oyraring av gulli.

12 So HARRIN vælsignaði hin seinna enda Jobs meiri enn byrjan hansara: tí hann hevði fjúrtan túsund seyðir, og seks túsund kamelar, og eitt túsund ok av oksum, og eitt túsund øsnur.

13 Hann hevði eisini sjey synir og tríggjar døtur.

14 Og hann kallaði navnið hjá hini fyrstu, Jĕ-mī´-mă; og navnið hjá hini aðru, Kĕ-zī´-ă; og navnið hjá hini triðju, Kêr´-ĕn-hăp´-pūch.

15 Og í øllum landinum vórðu ongar kvinnur funnar *so* fagrar sum døtur Jobs: og teirra faðir gav teimum arv millum brøður teirra.

16 Eftir hetta livdi Job eitt hundrað og fýrati ár, og sá synir sínar, og sonasynir sínar, *enntá* fýra ættarliðir.

17 So Job doyði, *verandi* gamalur og fullur av døgum.

PSÁLMABÓKIN.

PSÁLMUR 1

SIGNAÐUR *er* tann maður, sum gongur ikki í ráði teirra ógudiligu, ella stendur á syndara˘ vegi, ella situr í sæti hinna háðiligu.

2 Men hansara fragd *er* í lóg HARRANS; og í hansara lóg hann grundar dag og nátt.

3 Og hann skal vera líka *sum* eitt træ, plantað við løkirnar av vøtnum, sum ber fram ávøkst sín til tíð sína; hansara leyv eisini skal ikki følna; og hvatsumhelst hann ger skal framganga.

4 Hinir ógudiligu *eru* ikki so: men *eru* eins og dumban, sum vindurin rekur burtur.

5 Tí skulu teir ógudiligu ikki standast í dóminum, ella syndarar í samkomu hinna rættvísu.

6 Tí at HARRIN kennir veg teirra rættvísu: men vegur hinna ógudiligu skal týnast.

PSÁLMUR 2

HVÍ leika hinir heidnu óðir, og fólkið ímyndar ein fáfongdan lut?

2 Jarðarinnar kongar stilla seg, og stjórnararnir halda ráðlegging

saman, ímóti HARRANUM, og ímóti hansara salvaða, *sigandi,*
3 Latum okkum slíta teirra bond sundur, og kasta burt teirra reipˇ frá okkum.
4 Hann, sum situr í himnunum, skal læa: Harrin skal halda teir fyri gjøldur.
5 Tá skal hann tala við teir í síni vreiði, og plága teir í síni sváru misnøgd.
6 Tó havi eg sett mín kong uppá mín heilaga heygg Zions.
7 Eg vil kunngera avráðingina: HARRIN hevur sagt við meg, Tú *ert* Sonur mín; henda dag havi eg gitið teg.
8 Umbið av mær, og eg skal geva *tær* hinar heidnu *til* arv tín, og hinar ytstu partar jarðarinnar *til* ogn tína.
9 Tú skalt bróta teir við einum stavi av jarni; tú skalt smekka teir í stykkir eins og eitt pottamakara ker.
10 Verið vísir nú tessvegna, O tit kongar: verðið leiðbeindir, tit dómarar jarðarinnar.
11 Tænið HARRANUM við ótta, og fegnist við bivan.
12 Kyssið Sonin, at ikki hann verði firtin, og tit farist *frá* veginum, tá ið hansara vreiði verður kynd bert eitt sindur. Signaðir *eru* allir teir, sum seta sítt álit á hann.

PSÁLMUR 3

Ein Psálmur av Dávidi, tá ið hann flýddi frá Ăb-să-lōm-i, syni sínum.

HARRI, hvør eru teir øktir sum órógva meg! mangir *eru* teir sum rísa upp ímóti mær.
2 Mangir *tað veri seg* sum siga um mína sál, *Tað er* eingin hjálp hjá honum í Guði. Sē-lâh.
3 Men tú, O HARRI, *ert* ein skjøldur hjá mær; mín dýrd, og lyftarin upp av mínum høvdi.
4 Eg rópti á HARRAN við míni rødd, og hann hoyrdi meg úr sínum heilaga hóli. Sē-lâh.
5 Eg legði meg niður og svav; eg vaknaði; tí at HARRIN helt mær uppi.
6 Eg vil ikki vera ræddur fyri tíggju túsundum av fólki, sum hava sett *seg sjálvar* ímóti mær runt umkring.
7 Reis *teg,* O HARRI; frels meg, O Guð mín: tí at tú hevurt sligið allar mínar figgindar *uppá* kinnabeinið; tú hevurt brotið tenninar á teimum ógudiligu.
8 Frelsa *tilhoyrir* HARRANUM: tín signing *er* uppiá fólki tínum. Sē-lâh.

PSÁLMUR 4

Til hins hægsta Tónleikara á Nĕ-gī-nōth, Ein Psálmur av Dávidi.

HOYR meg, tá ið eg kalli, O Guð rættvísi mínar: tú hevurt størrað um meg *tá ið eg var* í neyð; hav miskunn yvir meg, og hoyr mína bøn.
2 O tit mannasynir, hvør leingi *vilja tit snúgva* mína dýrd yvirí skomm? *hvør leingi* vilja tit elska fáfongd, *og* søkja eftir ósannindi? Sē-lâh.
3 Men vitið, at HARRIN hevur sett fyri seg hann, sum er gudiligur, til sín sjálvs: HARRIN vil hoyra, tá ið eg kalli á hann.
4 Standið í ærufrykt, og syndið ikki: samtalið við tykkara egna hjarta uppiá song tykkara, og verið stillir. Sē-lâh.
5 Ofrið rættvísis sláturofrini, og setið tykkara álit á HARRAN.
6 *Tað veri seg* mangir sum siga, Hvør vil sýna okkum *nakað* gott? HARRI, lyft tú upp ljósið av tíni ásjón uppá okkum.
7 Tú hevurt lagt gleði í mítt hjarta, meir enn í tíðini *sum* teirra korn og teirra vín tók til.
8 Eg vil bæði leggja meg niður í friði, og sova: tí at tú, HARRI, einans fært meg *at* búgva í tryggleika.

PSÁLMUR 5

Til hins hægsta Tónleikara uppá Nē-hīl´-ōth, Ein Psálmur av Dávidi.

LÆN oyra til míni orð, O HARRI, umhugsa mína grundan.
2 Lýð á røddina á mínum rópi, mín Kongur, og mín Guð: tí til tín vil eg biðja.
3 Mína rødd skalt tú hoyra um morgunin, O HARRI; um morgunin vil eg beina *mína bøn* til tín, og vil hyggja upp.
4 Tí at tú *ert* ikki ein Guð sum hevur fragd í vondsku: eiheldur skal ilt búgva hjá tær.
5 Hinir fávitskutu skulu ikki standast í eygsjón tíni: tú hatart allar misgerðar-virkarar.
6 Tú skalt oyða teir sum tala ósatt: HARRANUM vil standast við hin blóðiga og svikafulla mann.
7 Men hvat mær viðvíkur, eg vil koma *inn í* hús títt í fjøldini av tíni miskunn: *og* í tínum ótta vil eg tilbiðja móti heilaga templi tínum.
8 Leið meg, O HARRI, í tíni rættvísi uppá grund av figgindum mínum; ger veg tín beinan frammi fyri andliti mínum.
9 Tí at *tað er* eingin trúskapur í teirra munni; teirra innvortis partur *er* sjálv vondska; teirra barki *er* eitt opið gravhýsi; teir smikra við síni tungu.
10 Oyð tú teir, O Guð; lat teir falla við egnu ráðum sínum; kasta teir út í fjøldini av teirra misbrotum; tí at teir hava gjørt uppreist ímóti tær.
11 Men lat allar teir, sum seta sítt álit á teg, fegnast: lat teir ævir rópa av frøi, av tí at tú verjirt teir: lat teir eisini, sum elska navn títt, vera frødligar í tær.
12 Tí at tú, HARRI, vilt vælsigna hin rættvísa; við góðtokka vilt tú umringa hann sum *við* einum skjøldri.

PSÁLMUR 6

Til hins hægsta Tónleikara á Nē´-gī-nōth, uppá Sjēm´-īn-īth; Ein Psálmur av Dávidi.

O HARRI, harta meg ikki í tíni firtni, eiheldur aga meg í tíni heitu misnøgd.
2 Hav miskunn yvir meg, O HARRI; tí eg *eri* veikur: O HARRI, grøð meg; tí míni bein eru nívd.
3 Mín sál er eisini sára nívd: men tú, O HARRI, hvussu leingi?
4 Kom aftur, O HARRI, útfría mína sál: á, frels meg fyri miskunnar tínar skuld.
5 Tí í deyða *er* eingin endurminning um teg: í grøvini, hvør skal veita tær tøkkir?
6 Eg eri móður av míni venan; alla náttina fái eg mína song at svimja; eg vatni mína legu við tárum mínum.
7 Mítt eyga er upptært orsakað av harmi; tað veksur gamalt uppá grund av øllum mínum figgindum.
8 Farið burtur frá mær, allir tit misgerðar-virkarar; tí at HARRIN hevur hoyrt røddina á mínum gráti.
9 HARRIN hevur hoyrt mína umbønan; HARRIN vil taka ímóti míni bøn.
10 Lat allar mínar figgindar verða til skammar og sára nívdar: lat teir venda aftur *og* verða til skammar brádliga.

PSÁLMUR 7

Sjīg´-gāi-ōn av Dávidi, sum hann sang at HARRANUM, viðvíkjandi orðunum hjá Cūsj Benjamita.

O HARRI Guð mín, á teg eg seti mítt álit: frels meg frá øllum teimum sum søkja at mær, og bjarga mær:
2 At ikki hann rívi mína sál sum ein leyva, skræðandi *hana* í stykkir, meðan *tað er* eingin at bjarga.

3 O HARRI Guð mín, um eg havi gjørt hetta; um tað veri *seg* misgerð í hondum mínum;
4 Um eg havi endurgoldið ilt at honum sum var í friði við meg; (ja, eg havi givið upp hann sum uttan grund er mín figgindi:)
5 Lat *so* figgindan søkja at míni sál, og taka *hana;* ja, lat hann traðka niður mítt lív uppá jørðina, og leggja mín heiður í støvið. Sē˙-lâh.
6 Reis *teg,* O HARRI, í tíni firtni, lyft upp teg sjálvan uppá grund av øðini hjá mínum figgindum: og vakna fyri meg *til* dómin *sum* tú hevurt áboðið.
7 So skal samkoman av fólkinum umringa teg umkring: fyri teirra sakir, tessvegna, vendi tú aftur á hædd*ini*.
8 HARRIN skal døma fólkið: døm meg, O HARRI, samsvarandi við mína rættvísi, og samsvarandi við mín heilleika, *sum* í mær *er*.
9 Á, lat vondsku teirra vondu fáa ein enda; men grundfest hin rættvísa: tí hin rættvísi Guð roynir hjørtuni og nýru.
10 Mín verja *er* av Guði, sum bjargar teimum reiðiligu í hjarta.
11 Guð dømir hinar rættvísu, og Guð er firtin *við hinar vondu* hvønn dag.
12 Um hann vendi*r* ikki, vil hann hvessa sítt svørð; hann hevur spent sín boga, og gjørt hann kláran.
13 Hann hevur eisini fyrireikað til hansara deyðans amboð˙; hann skipar sínar ørvar ímóti atsøkjarunum.
14 Sí, hann strevast við misgerð, og hevur alið fram mein, og borið fram fals.
15 Hann gjørdi eina holu, og gróv hana, og er fallin inn í gryvjuna *sum* hann gjørdi.
16 Hansara mein skal venda aftur uppá hans egna høvur, og hansara harðliga framfaring skal koma niður uppá hans egna knokk.
17 Eg vil prísa HARRANUM samsvarandi við hansara rættvísi: og vil syngja prís til navns HARRANS mest høga.

PSÁLMUR 8

Til hins hægsta Tónleikara uppá Gīt˙-tīth, Ein Psálmur av Dávidi.

O HARRI vár Harri, hvør avbært *er* navn títt á allari jørðini! hvør sett hevurt dýrd tína ǫmanfyri himnarnar.
2 Út úr munninum hjá pinkubørnum og bróstabørnum hevurt tú fyriskipað styrki uppá grund av figgindum tínum, at tú máttirt sissað figgindan og hevnaran.
3 Tá ið eg íhugi himnar tínar, verkið av fingrum tínum, mánan og stjørnurnar, sum tú hevurt innsett;
4 Hvat er maður, at tú ert minnugur um hann? og manssonurin, at tú vitjart hann?
5 Tí at tú hevurt gjørt hann eitt lítið *sindur* lægri enn einglarnar, og hevurt krýnt hann við dýrd og heiðuri.
6 Tú fekst hann at hava harradømi yvir verkum handa tína; tú hevurt lagt øll *ting* undir føtur hans:
7 Allan seyð og oksar, ja, og vallarins villdjór˙;
8 Fugl luftarinnar, og fisk havsins, *og hvatsumhelst ið* ferðast gjøgn sjógvanna rásir.
9 O HARRI vár Harri, hvør avbært *er* navn títt á allari jørðini!

PSÁLMUR 9

Til hins hægsta Tónleikara uppá Mŭth-lăb˙-bĕn, Ein Psálmur av Dávidi.

EG vil prísa *tær,* O HARRI, við øllum mínum hjarta; eg vil sýna fram øll tíni undurfullu verk.
2 Eg vil vera glaður og fegnast í tær: eg vil syngja prís til navns tíns, O tú mest Høgi.

3 Tá ið mínir figgindar eru vendir tilbakar, skulu teir falla og glatast fyri nærveru tíni.

4 Tí at tú hevurt uppihildið mín rætt og mína søk; tú satst í hásætinum, dømandi rætt.

5 Tú hevurt hartað hinar heidnu, tú hevurt oytt hinar vondu, tú hevurt sløkt út teirra navn um ævir og ævir.

6 O tú figgindi, oyðingar eru komnar til ein viðvarandi enda: og tú hevurt oyðilagt staðir; teirra minni er glatað við teimum.

7 Men HARRIN skal vara um ævir: hann hevur fyribúgvið sína trónu til dóms.

8 Og hann skal døma heimin í rættvísi, hann skal tæna *út* dóm til fólkið í reiðiligleika.

9 HARRIN eisini vil vera eitt skjól hjá teimum kúgaðu, eitt skjól í trongdartíðum.

10 Og teir, sum kenna títt navn, vilja seta sítt álit á teg: tí at tú, HARRI, hevurt ikki yvirgivið teir sum søkja teg.

11 Syngið prís*ing*ar til HARRANS, sum býr í Zion: kunngerið millum fólkið hansara gerningar.

12 Tá ið hann ger eftirkanning fyri blóð, minnist hann til teirra: hann gloymir ikki róp hinna eyðmjúku.

13 Hav miskunn yvir meg, O HARRI; umhugsa mína kvøl, *sum eg líði* av teimum sum hata meg, tú sum lyftirt meg upp frá deyðans portrum:

14 At eg má kunngera fram alt títt lov í portrum Zions dóttur: eg vil fegnast í tíni frelsu.

15 Hinir heidnu eru soknir niður í holuna *sum* teir gjørdu: í garnið, sum teir fjaldu, er teirra egni fótur tikin.

16 HARRIN er kendur *av* dóminum *sum* hann útinnir: hin vondi er snerraður í verki egnu handa sína. Hīg´-gāī-ŏn. Sē´-lâh.

17 Hinir vondu skulu verða vendir inn í helviti, *og* allar tjóðirnar sum gloyma Guð.

18 Tí hin tørvandi skal ikki alveg verða gloymdur: eftirvæntan teirra fátæku skal *ikki* farast um ævir.

19 Reis *teg,* O HARRI; lat ikki mann hava yvirvág: lat hinar heidnu verða dømdar í tíni eygsjón.

20 Loyp ótta á teir, O HARRI: *at* tjóðirnar mega kenna seg sjálvar *at vera bert* menn. Sē´-lâh.

PSÁLMUR 10

HVÍ stendurt tú langt burturifrá, O HARRI? *hvi* fjalirt tú *teg* í trongdartíðum?

2 Hin vondi í *síni* hugmóð søkir at hinum fátæka: lat teir verða tiknar í snildarráðunum sum teir hava ímyndað.

3 Tí hin vondi rósar *sær* av trá hjarta síns, og vælsignar hin havisjúka, *hvønn* HARRANUM stendst við.

4 Hin vondi, gjøgnum stoltleikan av síni ásjón, vil ikki søkja *eftir Guði:* Guð *er* ikki í øllum hansara tonkum.

5 Hansara vegir eru altíð herviligir; tínir dómar *eru* langt omanfyri úti úr eygsjón hansara: *hvat viðvíkur* øllum hansara figgindum, hann blæsur eftir teimum.

6 Hann hevur sagt í hjarta sínum, Eg skal ei verða vikaður: tí *eg skal* aldri *verða* í mótgangi.

7 Hansara munnur er fullur av banning og sviki og falsi: undir hansara tungu *er* mein og fáfongd.

8 Hann situr í bygdanna lúristøðum: í teimum duldu plássunum myrðir hann hin sakleysa: hans eygu eru loyniliga sett ímóti hinum fátæka.

9 Hann liggur á lúri loyniliga,

sum ein leyva í sínum helli: hann liggur á lúri *fyri* at fanga hin fátæka: hann fangar hin fátæka, tá ið hann dregur hann inn í sítt garn.

10 Hann krýpur, *og* eyðmýkir seg sjálvan, at hinir fátæku mega falla av hinum sterku hansara.

11 Hann hevur sagt í hjarta sínum, Guð hevur gloymt: hann fjalir sítt andlit; hann vil aldri sjá *tað*.

12 Reis *teg*, O HARRI; O Guð, lyft upp tína hond: gloym ei hinar eyðmjúku.

13 Hvørsvegna vanvirðir hin vondi Guð? hann hevur sagt í hjarta sínum, Tú vilt ikki krevja *tað*.

14 Tú hevurt sæð *tað;* tí at tú eygleiðirt mein og illvilja, at endurgjalda *tað* við tíni hond: hin fátæki lítur seg upp til tín; tú ert hjálparin hjá hinum faðirleysa.

15 Brót tú armin hjá hinum vonda og ónda *manninum:* leita upp hansara vondsku *til* tú finni onga.

16 HARRIN *er* Kongur um ævir og ævir: hinir heidnu eru glataðir úr hansara landi.

17 HARRI, tú hevurt hoyrt trá hinna eyðmjúku: tú vilt fyrireika teirra hjarta, tú vilt volda tínum oyra at hoyra:

18 At døma hin faðirleysa og hin kúgaða, at jarðarinnar maður má ei meira kúga.

PSÁLMUR 11

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

Á HARRAN eg seti mítt álit: hvussu siga tit til mína sál, Flýggja *sum* ein fuglur til fjalls tykkara?

2 Tí sí, hinir vondu spenna *sín* boga, teir gera tilreiðar sína ørv uppiá streinginum, at teir mega loyniliga skjóta eftir teimum reiðiligu í hjarta.

3 Um grundvøllirnir verði oyddir, hvat kann hin rættvísi gera?

4 HARRIN *er* í heilaga templi sínum, HARRANS hásæti *er* í himni: hans eygu skoða, hans eygnalokur royna mannabørnini.

5 HARRIN roynir hin rættvísa: men hin vonda, og hann sum elskar harðskap, sál hans hatar.

6 Uppá hin vonda skal hann regna snerrur, eld og brennistein, og ein ræðuligan ódnarvind: *hesin skal vera* skamturin av teirra bikari.

7 Tí hin rættvísi HARRI elskar rættvísi; hans ásjón skoðar hin reiðiliga.

PSÁLMUR 12

Til hins hægsta Tónleikara uppá Sjĕm-ĭn-ĭth, Ein Psálmur av Dávidi.

HJÁLP, HARRI; tí at hin gudiligi maðurin heldur uppat; tí hinir trúføstu svitast burturúr mannabørnunum.

2 Teir tala fáfongd hvør *og* ēin við næsta sín: *við* smikrandi vørrum *og* við einum tvíføldum hjarta teir tala.

3 HARRIN skal skera av allar smikrandi varrar, *og* tunguna sum talar hugmóðig ting:

4 Sum hava sagt, Við vári tungu vilja vit sigra; várar varrar *eru* okkar egnu: hvør *er* harri yvir okkum?

5 Fyri kúgan hinna fátæku, fyri suffan hinna tørvandi, nú vil eg reisast, sigur HARRIN; eg vil seta *hann* í tryggleika *frá honum sum* blæsur eftir honum.

6 Orðini hjá HARRANUM *eru* skír orð: *sum* silvur roynd í einum bræðsluovni av jørð, skírgaði sjey ferðir.

7 Tú skalt varða tey, O HARRI, tú skalt varðveita tey frá hesi ætt um ævir.

8 Teir vondu ganga á hvørjari síðu, tá ið hinir ringastu menn verða upphevjaðir.

PSÁLMUR 13

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

HVØR leingi vilt tú gloyma meg, O HARRI? um ævir? hvør leingi vilt tú fjala títt andlit frá mær?

2 Hvør leingi skal eg halda ráðlegging í míni sál, *havandi* sorg í mínum hjarta dagliga? hvør leingi skal mín fíggindi vera upphevjaður yvir meg?

3 Umhugsa *og* hoyr meg, O HARRI Guð mín: lýsna míni eygu, at ikki eg sovi deyðans *svøvn;*

4 At ikki mín fíggindi sigi, Eg havi fingið yvirvág ímóti honum; *og* teir, sum treingja meg, fegnist, tá ið eg verði vikaður.

5 Men eg havi litið á miskunn tína; mítt hjarta skal fegnast í tíni frelsu.

6 Eg vil syngja at HARRANUM, av tí at hann hevur farið stórtøkiliga við mær.

PSÁLMUR 14

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

DÁRIN hevur sagt í hjarta sínum, Eingin Guð *er.* Teir eru spiltir, teir hava gjørt andstyggilig verk, *tað er* eingin sum ger gott.

2 HARRIN hugdi niður frá himni uppá mannabørnini, at sjá um tað vóru nakrir sum skiltu, *og* søktu Guð.

3 Teir eru allir farnir til viks, teir eru *allir* samlir vorðnir gravskitnir: *tað er* eingin sum ger gott, nei, ikki ēin.

4 Hava allir misgerðar-virkararnir ongan kunnleika? sum eta upp fólk mítt *sum* teir eta breyð, og kalla ikki uppá HARRAN.

5 Har vóru teir í miklum ótta: tí at Guð *er* í ættini hjá teimum rættvísu.

6 Tit hava gjørt til skammar ráðið hjá arminganum, av tí at HARRIN *er* hansara skjól.

7 Á, at Ísraels frelsa *var komin* út úr Zion! tá ið HARRIN førir aftur fangaskap fólks síns, Jákob skal fegnast, *og* Ísrael skal vera glaður.

PSÁLMUR 15

Ein Psálmur av Dávidi.

HARRI, hvør skal dvølja í tabernakli tínum? hvør skal dvøljast í heilaga heyggi tínum?

2 Hann sum gongur reiðiliga, og virkar rættvísi, og talar sannleikan í sínum hjarta.

3 *Hann sum* bakbítur ikki við síni tungu, ella ger ilt við næsta sín, ella tekur upp eina brigslan ímóti næsta sínum.

4 Í hvørs eygum ein ringur persónur er vanvirdur; men hann heiðrar teir sum óttast HARRAN. *Hann sum* svør til *sín egna* skaða, og broytir ikki.

5 *Hann sum* setur ikki út sín pening til fæleigu, ella tekur endurgjald ímóti hinum sakleysa. Hann, sum ger hesi *ting,* skal aldri verða vikaður.

PSÁLMUR 16

Mīch'-tām av Dávidi.

VARÐVEIT meg, O Guð: tí á teg eg seti mítt álit.

2 *O sál mín,* tú hevurt sagt við HARRAN, Tú *ert* Harri mín: mín góðska *røkkur* ikki til tín;

3 *Men* til hinna heiløgu, sum *eru* á jørðini, og *til* hinna avbæru, í hvørjum *er* øll mín fragd.

4 Teirra sorgir skulu verða margfaldaðar, *sum* skunda *eftir* einum øðrum *gudi:* teirra drykkoffur˘ av blóði vil eg ikki ofra, ella taka upp teirra nøvn í mínar varrar.

5 HARRIN *er* skamturin av mínum arvi og av mínum bikari: tú heldurt uppi luti mínum.

6 *Máti*linjurnar eru falnir mær

í dámlig *pláss;* ja, eg havi ein stásiligan arvalut.

7 Eg vil vælsigna HARRAN, sum hevur givið mær ráð: míni nýru eisini leiðbeina mær í náttartíðunum.

8 Eg havi sett HARRAN altíð frammi fyri mær: av tí at *hann er* við mína høgru hond, skal eg ikki verða vikaður.

9 Tí er mítt hjarta glatt, og mín dýrd fegnast: mítt kjøt eisini skal hvíla í vón.

10 Tí at tú vilt ikki eftirlata mína sál í helviti; eiheldur vilt tú loyva Hinum Heilaga tínum at síggja rot.

11 Tú vilt sýna mær lívsins gøtu: í tíni nærveru *er* fylling av frøi; við tína høgru hond, *har eru* fragdir um ævirmeir.

PSÁLMUR 17

Ein Bøn av Dávidi.

HOYR rættin, O HARRI, gáa at mínum rópi, læn oyra at míni bøn, *sum gongur* ikki út úr falsaðum vørrum.

2 Lat mín úrskurð koma fram frá nærveru tíni; lat tíni eygu skoða tey ting sum eru bein.

3 Tú hevurt roynt mítt hjarta; tú hevurt vitjað *meg* um náttina; tú hevurt roynt meg, *og* skalt einkið finna; eg eri avráddur *í, at* mín muður skal ikki misbróta.

4 Viðvíkjandi verkum manna, við orðinum av tínum vørrum havi eg hildið *meg frá* oyðarans gøtum.

5 Halt uppi mínum gongum í gøtum tínum, *at* míni fótafet glíði ei.

6 Eg havi kallað uppá teg, tí at tú vilt hoyra meg, O Guð: boygg títt oyra at mær, *og hoyr* mína talu.

7 Sýn tína undrunarverdu elskandi blíðsemi, O tú sum frelsirt við tíni høgru hond teir sum seta sítt álit *á teg*, frá teimum sum rísa upp *ímóti teimum*.

8 Varða meg sum eygnasteinin, fjal meg undir skugga veingja tína,

9 Frá teimum vondu sum kúga meg, *frá* mínum deyðsomu figgindum, *sum* umringa meg íkring.

10 Teir eru innilokaðir í sínum egna feitti: við sínum munni teir tala stoltsliga.

11 Teir hava nú umringað okkum í okkara fetum: teir hava sett síni eygu bogandi niður til jarðarinnar;

12 Líka sum ein leyva, *sum* er grádig um sína bráð; og sum var tað ein ung leyva, lúrandi í loyniligum plássum.

13 Reis *teg,* O HARRI, skuffa hann, kasta hann niður: bjarga míni sál frá tí vonda, *sum er* títt svørð:

14 Frá monnum *sum eru* tín hond, O HARRI, frá veraldarinnar monnum, *sum hava* skamt sín í *hesum* lívinum, og hvørs kvið tú fyllirt við fjalda *dýrgripi* tínum: teir eru fullir av børnum, og eftirlata restina av sínum *figgjarevni* til pinkubørn síni.

15 Hvat mær viðvíkur, eg vil skoða títt andlit í rættvísi: eg skal verða mettaður, tá ið eg vakni, við tínum líkleika.

PSÁLMUR 18

Til hins hægsta Tónleikara; *Ein Psálmur* av Dávidi, tænara HARRANS, sum talaði innat HARRANUM orðini av hesum songi á tí degi *ið* HARRIN útfríaði hann frá hondini hjá øllum hansara figgindum, og frá hendi Sauls: Og hann segði,

EG vil elska teg, O HARRI, mín styrki.

2 HARRIN *er* mín klettur, og mítt virki, og mín útfríari; mín Guð, mín styrki, á hvønn eg vil líta; mín skjøldur, og horn frelsu mínar, *og* mítt høga torn.

3 Eg vil kalla uppá HARRAN, *sum er verdur* at verða prísaður: so skal eg verða frelstur frá mínum figgindum.

4 Sorgir deyðans umringaðu meg, og flóðirnar av ógudiligum monnum gjørdu meg ræddan.
5 Sorgir helvitis umringaðu meg umkring: snerrur deyðans komu mær á møti.
6 Í míni neyð eg kallaði uppá HARRAN, og geylaði á mín Guð: hann hoyrdi mína rødd úr sínum templi, og mítt geyl kom framfyri hann, *enntá* inn í hans oyru.
7 Tá rystist jørðin og nøtraði; grundvøllirnir eisini av heyggjunum fluttust og vórðu skakaðir, av tí at hann var vreiður.
8 Tað fór upp ein roykur út úr hans nasum, og eldur úr hansara munni upptærdi: kol vórðu kynd av tí.
9 Hann boygdi himnarnar eisini, og kom niður: og myrkur *var* undir hans fótum.
10 Og hann reið uppiá einum cherubi, og fleyg: ja, hann fleyg uppiá veingjum vindsins.
11 Hann gjørdi myrkur *til* sítt loyniliga pláss; hansara tjaldbúð rundan um hann *vóru* myrk vøtn *og* tjúkk skýggj loftanna.
12 Fyri bjartleikanum, *sum var* frammanfyri honum, ferðaðust hansara tjúkku skýggj, hegl*steinar* og kolˇ av eldi.
13 HARRIN eisini toraði í himnunum, og hin Hægsti gav sína rødd; hegl*steinar* og kolˇ av eldi.
14 Ja, hann sendi út sínar ørvar, og spjaddi teir; og hann skeyt út snarljósˇ, og uppskakaði teir.
15 Tá vórðu kanalir vatnanna sæddar, og grundvøllir veraldarinnar vórðu avhuldir fyri tíni hartan, O HARRI, fyri blakinum av andadráttinum av tínum nasum.
16 Hann sendi úr erva, hann meg tók, hann dró meg út úr mongum vøtnum.
17 Hann bjargaði mær frá mínum sterka fígginda, og frá teimum ið hataðu meg: tí at teir vóru ov sterkir fyri meg.
18 Teir komu mær á møti á deginum av mínum skaðatilburði: men HARRIN var mín stuðul.
19 Hann førdi meg fram eisini inn í eitt stórt pláss; hann bjargaði mær, av tí at hann fragdaðist í mær.
20 HARRIN endurgalt mær samsvarandi við mína rættvísi; samsvarandi við reinleikan av mínum hondum hevur hann viðurgoldið mær.
21 Tí eg havi hildið HARRANS vegir, og havi ikki vondligani vikið frá mínum Guði.
22 Tí at allir hansara dómar *vóru* frammi fyri mær, og eg koyrdi ikki burtur hans ásetingar frá mær.
23 Eg var eisini reiðiligur frammi fyri honum, og eg helt meg frá míni misgerð.
24 Tí hevur HARRIN viðurgoldið mær samsvarandi við mína rættvísi, samsvarandi við reinleikan av mínum hondum í hans eygsjón.
25 Hjá tí miskunnarfulla, tú vilt sýna teg sjálvan miskunnarfullan; hjá einum reiðiligum manni, tú vilt sýna teg sjálvan reiðiligan;
26 Hjá tí skíra, tú vilt sýna teg sjálvan skíran; og hjá tí tvørlynta, tú vilt sýna teg sjálvan tvørlyntan.
27 Tí at tú vilt frelsa hitt nívda fólkið; men vilt føra niður høg eygnabrá.
28 Tí at tú vilt kveikja mítt kerti: HARRIN mín Guð vil lýsna mítt myrkur.
29 Tí at viðˆ tær havi eg runnið ígjøgnum eina fylking; og viðˆ mínum Guði havi eg lopið yvir ein múr.
30 *Hvat viðvíkur* Guði, hansara vegur *er* fullkomin: HARRANS orð er roynt: hann *er* ein skjøldur fyri øllum teimum sum líta á hann.

31 Tí at hvør *er* Guð uttan HARRIN? ella hvør *er* ein klettur uttan vár Guð?
32 *Tað er* Guð sum gyrðir meg við styrki, og ger vegin hjá mær fullkomnan.
33 Hann ger mínar føtur líka *sum* hinda *føtur,* og setur meg uppá míni høgu pláss.
34 Hann lærir mínar hendur at kríggjast, so at ein bogi av stál verður brotin av mínum ørmum.
35 Tú hevurt eisini givið mær skjøldur frelsu tínar: og tín høgra hond hevur hildið mær uppi, og tín mildleiki hevur gjørt meg miklan.
36 Tú hevurt størrað um míni fet undir mær, at mínir føtur gliðu ei.
37 Eg havi elt mínar figgindar, og innheintað teir: eiheldur vendi eg tilbakar, til teir vóru upptærdir.
38 Eg havi sært teir, at teir vóru ikki førir fyri at reisa *seg:* teir eru falnir undir mínar føtur.
39 Tí at tú hevurt gyrt meg við styrki til bardagan: tú hevurt undirlagt undir meg teir sum risu upp ímóti mær.
40 Tú hevurt eisini givið mær svírarnar á mínum figgindum; at eg mátti oyða teir sum hata meg.
41 Teir geylaðu, men *tað var* eingin at frelsa *teir: enntá* á HARRAN, men hann svaraði teimum ikki.
42 Tá bardi eg teir smáar sum støvið fyri vindinum: eg kastaði teir út sum skarnið í gøtunum.
43 Tú hevurt útfríað meg frá stríðingunum av fólkinum; *og* tú hevurt gjørt meg *til* høvd teirra heidnu: eitt fólk, *hvørjar* eg ei havi kent, skulu tæna mær.
44 So skjótt sum teir hoyra um meg, skulu teir akta meg: hinir fremmandu skulu undirgeva seg mær.
45 Hinir fremmandu skulu svinna burt, og verða ræddir úr sínum innilok*aðu* plássum.
46 HARRIN livir; og vælsignaður *veri* mín klettur; og veri Guð frelsu mínar upphevjaður.
47 *Tað er* Guð sum hevnir meg, og undirleggur fólkið undir meg.
48 Hann bjargar mær frá mínum figgindum: ja, tú lyftirt meg upp uppum teir sum risu upp ímóti mær: tú hevurt bjargað mær frá tí harðliga manninum.
49 Tí vil eg veita tær tøkkir, O HARRI, hinna heidnu millum, og syngja lovprís*ing*ar at tínum navni.
50 Mikla útfrían gevur hann til kongs síns; og sýnir miskunn mót sínum salvaða, mót Dávidi, og mót hansara sáði um ævirmeir.

PSÁLMUR 19

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

HIMNARNIR kunngera Guðs dýrd; og hválvið sýnir hansara handaverk.
2 Dagur at degi mælir talu, og nátt *fram*at nátt sýnir kunnleika.
3 *Tað er* eingin tala, ella tungumál, *har* teirra rødd er ikki hoyrd.
4 Teirra *máti*linja er farin út gjøgnum alla jørðina, og teirra orð til endan á verøldini. Í teimum hevur hann sett eitt tabernakkul fyri sólina,
5 Sum *er* eins og ein brúðgómur, komandi út úr kamari sínum, *og* fegnast sum ein sterkur maður til at renna eina kapprenning.
6 Hansara faring fram *er* frá enda himinsins, og hansara ringrás at endum hans: og tað er einkið fjalt frá hitanum hará.
7 HARRANS lóg *er* fullkomin, umvendandi sálina: HARRANS vitnisburður *er* vissur, gerandi vísar hinar einføldu.

8 HARRANS ásetingar *eru* rættar, *gerandi* hjartað fegið: HARRANS boð *er* skírt, lýsnandi eyguni.
9 HARRANS ótti *er* reinur, varandi um ævir: HARRANS dómar *eru* sannir *og* rættvísir allir samlir.
10 Meir at verða tráaðir *teir eru* enn gull, ja, enn nógv fínt gull: søtari eisini enn hunangur og hunangskøkan.
11 Harafturat viðˆ teimum er tænari tín ávaraður: *og* í halding av teimum *er* mikið endurgjald.
12 Hvør kann skilja *sínar* villfaringar? reinsa tú meg frá loyniligum *feilum*.
13 Halt aftur tín tænara eisini frá framførnisligum *syndum;* lat tær ikki hava harradømi yvir mær: tá skal eg vera reiðiligur, og eg skal vera ósekur frá hinum mikla misbroti.
14 Lat orðini av mínum munni, og grundingina av mínum hjarta, vera góðtakilig í tíni eygsjón, O HARRI, mín styrki, og mín endurloysari.

PSÁLMUR 20

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

HARRIN teg hoyri á degi trongdarinnar; navn Guðs Jákobs teg verji;
2 Sendi tær hjálp frá halgidóminum, og teg styrki úr Zion;
3 Minnist øll tíni offur, og taki við tínum brenni-sláturofri; Sél-âh.
4 Veiti tær samsvarandi við títt egna hjarta, og uppfylli alt títt ráð.
5 Vit vilja fegnast í tíni frelsu, og í Guðs várs navni vilja vit seta upp *vári* hermerkir: HARRIN uppfylli allar tínar umbøningar.
6 Nú veit eg, at HARRIN frelsir sín salvaða; hann vil hoyra hann frá sínum heilaga himni við hini frelsandi styrki av síni høgru hond.
7 Summir *líta* á hervagnar, og summir á hestar: men vit vilja minnast til navns HARRANS Guðs várs.
8 Teir eru førdir niður og falnir: men vit eru risnir, og standa upprættir.
9 Frels, HARRI: kongur hoyri okkum, tá ið vit kalla.

PSÁLMUR 21

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

KONGUR skal frøast í tíni styrki, O HARRI; og í tíni frelsu hvør stórligani skal hann fegnast!
2 Tú hevurt givið honum tráina hjá hansara hjarta, og hevurt ikki afturhildið fyrispurningin av hansara varrum. Sél-âh.
3 Tí at tú kemurt honum á møti við signingum góðskunnar: tú seturt eina krúnu av skírum gulli á høvur hans.
4 Hann umbað lív av tær, *og* tú gavst honum *tað, enntá* longd av døgum um ævir og ævir.
5 Hansara dýrd *er* mikil í frelsu tíni: heiður og hátign hevurt tú lagt uppá hann.
6 Tí at tú hevurt gjørt hann mest signaðan um ævir: tú hevurt gjørt hann avbera glaðan við tíni ásjón.
7 Tí at kongur lítur á HARRAN, og gjøgnum miskunn hins mest Høga skal hann ei verða vikaður.
8 Tín hond skal finna fram allar tínar figgindar: tín høgra hond skal finna fram hasar sum hata teg.
9 Tú skalt gera teir sum ein eldsligan ovn í tíðini av tíni firtni: HARRIN skal svølgja teir upp í síni vreiði, og eldurin skal upptæra teir.
10 Teirra frukt skalt tú oyða frá jørðini, og teirra sáð frá millum mannabørnini.
11 Tí at teir ætlaðu ilt ímóti

tær: teir ímyndaðu *sær* eitt skaðasamt snildarráð, *sum* teir eru ikki førir fyri *at útinna*.

12 Tí skalt tú fáa teir *at* venda sínar ryggir, *tá ið* tú skalt gera klárar *tínar ørvar* uppiá streingjum tínum ímóti andlitinum á teimum.

13 Veri tú upphevjaður, HARRI, í tíni egnu styrki: *so* vilja vit syngja og prísa tínum mátti.

PSÁLMUR 22

Til hins hægsta Tónleikara uppá Âĭ´-jĕ-lĕth Sjá´-hâr, Ein Psálmur av Dávidi.

GUÐ mín, Guð mín, hví hevurt tú yvirgivið meg? *hví ert tú so* fjart frá at hjálpa mær, *og frá* orðunum av míni ýling?

2 O Guð mín, eg geyli um dagsleitið, men tú hoyrirt ei; og á náttartíðini, og eri ikki tigandi.

3 Men tú *ert* heilagur, *O tú* sum íbýrt *lov*prís*ing*ar Ísraels.

4 Várir fedrar litu á teg: teir litu, og tú bjargaðirt teim.

5 Teir rópaðu á teg, og vórðu bjargaðir: teir litu á teg, og vórðu ikki fjamskaðir.

6 Men eg *eri* ein ormur, og eingin maður; ein brigslan hjá monnum, og vanvirdur av fólkinum.

7 Allir teir, sum síggja meg, læa meg í háð: teir skjóta út vørrina, teir rista høvdið, *sigandi,*

8 Hann leit á HARRAN, *at* hann vildi bjarga honum: lat hann bjarga honum, við tað at hann fragdaðist í honum.

9 Men tú *ert* hann sum tók meg út úr móðurlívinum: tú fekst meg *at* vóna, *tá ið eg var* uppiá bróstum móður mínar.

10 Eg varð kastaður uppá teg frá móðurlívinum: tú *ert* Guð mín frá kviði móður mínar.

11 Ver ikki fjart frá mær; tí at trongd *er* nær; tí at *tað er* eingin at hjálpa.

12 Nógvir tarvar hava umringað meg: sterkir *tarvar* Bá´-sjän-s hava umgirt meg umkring.

13 Teir gapaðu uppá meg *við* sínum munnum, *sum* ein ránfús og ein ýlandi leyva.

14 Eg eri heltur út líkasum vatn, og øll míni bein eru úti úr liði: mítt hjarta er líkasum vaks; tað er smeltað í miðjum innangoymslum mínum.

15 Mín styrki er tornað upp líkasum eitt pottabrot; og mín tunga krøkist til kjálkar mínar; og tú hevurt ført meg inn í deyðans dusm.

16 Tí at hundar hava umringað meg: savnaður hinna vondu hava innilokað meg: teir gataðu mínar hendur og mínar føtur.

17 Eg kann telja øll míni bein: teir hyggja *og* stara uppá meg.

18 Teir skifta míni klæðir sín ámillum, og kasta lutir uppá mín kappa.

19 Men ver ikki tú fjart frá mær, O HARRI: O styrki mín, skunda tær at hjálpa mær.

20 Bjarga míni sál frá svørðinum; míni yndis frá valdi hundsins.

21 Frels meg frá leyvunnar munni: tí at tú hevurt hoyrt meg frá hornum ēinhyrninganna.

22 Eg vil kunngera títt navn at brøðrum mínum: í miðjari samkomuni vil eg prísa tær.

23 Tit, sum óttast HARRAN, prísið honum; allir tit Jákobs sáð, dýrðmetið hann; og óttist hann, allir tit Ísraels sáð.

24 Tí at hann hevur ikki vanvirt, ella stiknast við nívd hins nívda; eiheldur hevur hann fjalt sítt andlit frá honum; men tá ið hann rópti at honum, hann hoyrdi.

25 Mín *lov*prís*an skal vera* av tær í hini miklu samkomu: eg vil rinda míni heitstreingir frammi fyri teimum ið óttast hann.

26 Hinir eyðmjúku skulu eta og verða mettaðir: teir skulu prísa

HARRANUM, sum søkja hann: tykkara hjarta skal liva um ævir.
27 Allir veraldar endar skulu minnast og venda at HARRANUM: og øll ættarfólk tjóðanna skulu tilbiðja frammi fyri tær.
28 Tí at kongadømið *er* HARRANS: og hann *er* landsstjórin tjóðanna millum.
29 Allir *teir, sum veri seg* feitir uppiá jørð, skulu eta og tilbiðja: allir teir, sum fara niður til støvið, skulu lúta frammi fyri honum: og eingin kann halda á lívi síni egnu sál.
30 Eitt sáð skal tæna honum; tað skal verða roknað til Harrans fyri eina ætt.
31 Teir skulu koma, og skulu kunngera hansara rættvísi at einum fólki sum skal verða føtt, at hann hevur gjørt *hetta*.

PSÁLMUR 23

Ein Psálmur av Dávidi.

HARRIN *er* hirði mín; mær skal ikki fattast.
2 Hann fær meg at liggja á grønum beitum: hann leiðir meg við lið hinna stillu vatna.
3 Hann endurbøtir sál mína: hann leiðir meg á leiðum rættvísis fyri navns síns skuld.
4 Ja, tó at eg gangi gjøgn deyðsskuggans dal, eg vil einkið ilt óttast: tí at tú *ert* við mær; tín keppur og tín stavur, teir ugga meg.
5 Tú reiðirt eitt borð frammi fyri mær í nærveru figginda mína: tú salvart mítt høvur við olju; mítt bikar yvir flýtur.
6 Vissuliga, góðska og miskunn skulu fylgja mær allar dagar lívs míns: og eg vil dvøljast í húsi HARRANS um ævir.

PSÁLMUR 24

Ein Psálmur av Dávidi.

JØRÐIN *er* HARRANS, og hennara fylling; verøldin, og teir sum dvøljast harí.
2 Tí at hann hevur grundað hana uppiá sjógvunum, og grundfest hana uppiá flóðunum.
3 Hvør skal stíga upp á heyggj HARRANS? ella hvør skal standa í heilaga plássi hans?
4 Hann, ið reinar hevur hendur, og eitt skírt hjarta; sum ikki hevur lyft upp sína sál at fáfongd, ella svorið svikaliga.
5 Hann skal fáa signingina frá HARRANUM, og rættvísi frá Guði frelsu sínar.
6 Hetta *er* ættin hjá teimum ið søkja hann, sum søkja títt andlit, O Jákob. Sē´lâh.
7 Hevjið upp tykkar høvdum, O tit portur; og verðið tit hevjaðar upp, tit ævigu hurðar; og dýrdar Kongurin skal koma inn.
8 Hvør *er* hesin dýrdar Kongur? HARRIN sterkur og mektigur, HARRIN mektigur í bardaga.
9 Hevjið upp tykkar høvdum, O tit portur; enntá hevjið *teim* upp, tit ævigu hurðar; og dýrdar Kongurin skal koma inn.
10 Hvør er hesin dýrdar Kongur? HARRI herliðanna, hann *er* Kongur dýrdarinnar. Sē´lâh.

PSÁLMUR 25

Ein Psálmur av Dávidi.

AT tær, O HARRI, lyfti eg upp mína sál.
2 O Guð mín, eg líti á teg: lat meg ikki verða til skammar, lat ei mínar fíggindar stórsigra yvir meg.
3 Ja, lat ongar, sum bíða eftir tær, verða til skammar: lat teir verða til skammar sum misbróta uttan grund.
4 Sýn mær tínar vegir, O HARRI; lær meg tínar leiðir.
5 Leið meg í sannleika tínum, og lær meg: tí at tú *ert* Guð frelsu mínar; eftir tær eg bíði allan dagin.
6 Minst til, O HARRI, tínar eymu miskunnir og tínar elskandi

blíðsemir; tí at tær *hava verið* ævir úr forðum.

7 Minst ikki syndir ungdóms míns, ella míni misbrot: samsvarandi við tína miskunn minst tú til mín fyri góðsku tínar skuld, O HARRI.

8 Góður og reiðiligur *er* HARRIN: tí vil hann læra syndarar í veginum.

9 Hinar eyðmjúku vil hann leiða í dómi: og hinar eyðmjúku vil hann læra sín veg.

10 Allar HARRANS leiðir *eru* miskunn og sannleiki hjá slíkum sum halda hansara sáttmála og hansara vitnisburðir.

11 Fyri navns tíns skuld, O HARRI, náða mína misgerð; tí at hon *er* mikil.

12 Hvør maður *er* hann sum óttast HARRAN? hann skal hann læra í veginum *sum* hann skal velja.

13 Hansara sál skal búgva í ró; og hansara sáð skal arva jørðina.

14 HARRANS loyndarmál *er* hjá teimum ið óttast hann; og hann vil sýna teim sáttmála sín.

15 Míni eygu *eru* ævir mótvegis HARRANUM; tí at hann skal slíta mínar føtur út úr garninum.

16 Vend tær at mær, og hav miskunn yvir meg; tí at eg *eri* ēinligur og nívdur.

17 Trongdirnar hjá mínum hjarta eru størraðar um: *O* før tú meg út úr neyðum mínum.

18 Hygg uppá mína nívd og mína pínu; og fyrigev allar syndir mínar.

19 Umhugsa mínar fíggindar; tí at teir eru mangir; og teir hata meg við grimmum hatri.

20 O varða mína sál, og bjarga mær: lat meg ei verða til skammar; tí eg seti mítt álit á teg.

21 Lat heilleika og reiðiligleika varðveita meg; tí eg bíði eftir tær.

22 Endurloys Ísrael, O Guð, út úr øllum trongdum hans.

PSÁLMUR 26

Ein Psálmur av Dávidi.

DØM meg, O HARRI; tí eg havi gingið í mínum heilleika: eg havi litið eisini á HARRAN; eg *tí* skal ikki glíða.

2 Kanna meg, O HARRI, og prøva meg; royn míni nýru og mítt hjarta.

3 Tí at tín elskandi blíðsemi *er* frammi fyri eygum mínum: og eg havi gingið í tínum sannleika.

4 Eg havi ikki sitið við fáfongdum persónum, eiheldur vil eg fara inn við kávalátarum.

5 Eg havi hatað samkomuna av illgerarum; og vil ikki sita við hinum vondu.

6 Eg vil tváa mínar hendur í sakloysi: so vil eg kringfara títt altar, O HARRI:

7 At eg má kunngera við takkarveitanar-røddini, og siga frá øllum tínum undursomu verkum.

8 HARRI, eg havi elskað bústað húss tíns; og plássið har heiður tín býr.

9 Savna ikki mína sál við syndarum, ella mítt lív við blóðigum monnum:

10 Í hvørs hondum *er* skaði, og teirra høgra hond er full av mutrum.

11 Men hvat viðvíkur mær, eg vil ganga í heilleika mínum: endurloys meg, og ver mær miskunnarfullur.

12 Mín fótur stendur í einum jøvnum plássi: í samkomunum vil eg vælsigna HARRAN.

PSÁLMUR 27

Ein Psálmur av Dávidi.

HARRIN *er* ljós mítt og frelsa mín; hvønn skal eg óttast? HARRIN *er* styrki lívs míns; fyri hvørjum skal eg vera ræddur?

2 Tá ið teir vondu, *enntá* mínir fíggindar og mínir óvinir, komu uppá meg at eta upp hold mítt, teir snávaðu og fullu.

3 Hóast eitt herlið skuldi leirast ímóti mær, mítt hjarta skal ikki óttast: hóast kríggj skuldi risið ímóti mær, í hesum *vil* eg *vera* troystarfullur.

4 Eitt *ting* havi eg tráað av HARRANUM, tí vil eg søkja eftir; at eg má dvøljast í húsi HARRANS allar dagar lívs míns, at skoða vakurleika HARRANS, og at fregnast í templi hans.

5 Tí at í tíðini av trongd skal hann fjala meg í síni tjaldbúð: í loyndini av sínum tabernakli skal hann fjala meg; hann skal seta meg upp uppá ein klett.

6 Og nú skal mítt høvur verða lyft upp uppum mínar figgindar rundan um meg: tí vil eg ofra í hansara tabernakli sláturoffur˘ av frøi; eg vil syngja, ja, eg vil syngja HARRANUM *lov*prís*ing*ar.

7 Hoyr, O HARRI, *tá ið* eg rópi við rødd míni: hav miskunn eisini yvir meg, og svara mær.

8 *Tá ið tú segðirt,* Søkið tit andlit mítt; segði mítt hjarta við teg, Títt andlit, HARRI, vil eg søkja.

9 Fjal ikki títt andlit *fjart* frá mær; koyr ikki tín tænara burtur í firtni: tú hevurt verið mín hjálp; far ikki frá mær, eiheldur yvirgev meg, O Guð frelsu mínar.

10 Tá ið mín faðir og mín móðir yvirgeva meg, HARRIN tá vil taka meg upp.

11 Lær meg tín veg, O HARRI, og leið meg á eini slættari leið, uppá grund av mínum figgindum.

12 Flýggja meg ikki yvir at viljanum hjá mínum figgindum: tí at følsk vitnir eru risin upp ímóti mær, og slíkir sum anda út grimd.

13 *Eg hevði ørmaktast,* uttan *so* eg hevði trúð at síggja góðsku HARRANS í landi teirra livandi.

14 Bíða eftir HARRANUM: ver við gott treyst, og hann skal styrkja títt hjarta: bíða, eg sigi, eftir HARRANUM.

PSÁLMUR 28

Ein Psálmur av Dávidi.

ÁTEG vil eg rópa, O HARRI mín klettur; ver ikki tigandi fyri mær: at ikki, *um* tú veri *teg* tigandi fyri mær, eg gerist eins og teir sum fara niður í holuna.

2 Hoyr røddina á mínum umbøningum, tá ið eg rópi á teg, tá ið eg lyfti upp mínum hondum mót tínum heilaga orakli.

3 Drag meg ikki burtur við hinum vondu, og við misgerðarvirkarunum, sum tala frið til næsta sína, men mein *er* í teirra hjørtum.

4 Gev teimum samsvarandi við teirra gerðir, og samsvarandi við vondskuna av teirra strembingum: gev teimum eftir verki handa teirra; rinda til teirra teirra uppiburð.

5 Av tí at teir geva ikki gætur eftir verkum HARRANS, ella *eftir* virknaði handa hans, skal hann oyða teir, og ikki byggja teir upp.

6 Vælsignaður *veri* HARRIN, av tí at hann hevur hoyrt røddina á mínum umbøningum.

7 HARRIN *er* mín styrki og mín skjøldur; mítt hjarta leit á hann, og eg eri hjálptur: tí fegnast mítt hjarta stórliga; og við mínum songi vil eg prísa honum.

8 HARRIN *er* teirra styrki, og hann *er* hin frelsandi styrkin hjá sínum salvaða.

9 Frels fólk títt, og vælsigna tín arv: føð tey eisini, og lyft tey upp um ævir.

PSÁLMUR 29

Ein Psálmur av Dávidi.

GEVIÐ HARRANUM, O tit mektigu, gevið HARRANUM dýrd og styrki.

2 Gevið HARRANUM dýrdina — skyldug at hansara navni; tilbiðjið HARRAN í vakurleikanum av heilagleika.

3 HARRANS rødd *er* uppiá vøtnunum: dýrdarinnar Guð torar: HARRIN *er* uppiá mongum vøtnum.
4 HARRANS rødd *er* kraftmikil; HARRANS rødd *er* full av hátign.
5 HARRANS rødd brýtur sedris*trøini*; ja, HARRIN brýtur Lí´-bă-nŏn-s sedris*trø*.
6 Hann fær teir eisini at støkka líkasum ein kálvur; Lí´-bă-nŏn og Sĭ´-rĭ-ŏn líkasum ein ungur ēinhyrningur.
7 HARRANS rødd deilir logarnar av eldi.
8 HARRANS rødd ristir oyðuna; HARRIN skakar Ká´-dĕsj oyðuna.
9 HARRANS rødd fær hindirnar at kálva, og avhylur skógirnar: og í hansara templi talar hvør *og* ēin um *hansara* dýrd.
10 HARRIN situr uppiá flóðini; ja, HARRIN situr Kongur um ævir.
11 HARRIN vil geva sínum fólki styrki; HARRIN vil signa sítt fólk við friði.

PSÁLMUR 30

Ein Psálmur *og* Songur *við* innvígingina av húsi Dávids.

EG vil hálova tær, O HARRI; tí at tú hevurt lyft meg upp, og hevurt ikki fingið mínar figgindar at fegnast yvir mær.
2 O HARRI Guð mín, eg rópti á teg, og tú hevurt grøtt meg.
3 O HARRI, tú hevurt ført upp mína sál frá grøvini: tú hevurt hildið meg á lívi, at eg skuldi ikki fara niður til holuna.
4 Syngið HARRANUM, O tit heilagu hjá honum, og veitið tøkkir við endurminningina um hansara heilagleika.
5 Tí at hansara firtni *varir bert í* eitt bil; í hansara tokka *er* lív: grátur kann vara í eina nátt, men gleði *kemur* um morgunin.
6 Og í míni framgongd eg segði, Eg skal aldri verða vikaður.
7 HARRI, við tínum tokka hevurt tú fingið mítt fjall at standa sterkt: tú fjaldirt títt andlit, *og* eg varð órógvaður.
8 Eg rópti til tín, O HARRI; og at HARRANUM gjørdi eg umbønan.
9 Hvat gagn *er* í blóði mínum, tá ið eg fari niður til holuna? Skal dustið prísa tær? skal tað kunngera sannleika tín?
10 Hoyr, O HARRI, og hav miskunn yvir meg: HARRI, ver tú mín hjálpari.
11 Tú hevurt vent fyri meg mína harman yvirí dansan: tú hevurt tikið av mítt sekkjaklæði, og gyrt meg við gleði;
12 Til tess endamáls, at *mín* dýrd má syngja prís til tín, og ei vera tigandi. O HARRI Guð mín, eg vil veita tøkkir til tín um ævir.

PSÁLMUR 31

Til hins hægsta Tónleikara, Ein Psálmur av Dávidi.

Á TEG, O HARRI, eg seti mítt álit; lat meg aldri skammast: bjarga mær í tíni rættvísi.
2 Boygg niður títt oyra til mín; bjarga mær skundisliga: vert tú mín sterki klettur, til eitt verjuhús at frelsa meg.
3 Tí at tú *ert* mín klettur og mín festningur; tessvegna, fyri navns tíns skuld, leið meg, og vegleið meg.
4 Toga meg út úr garninum sum teir hava loyniliga lagt til mín: tí at tú *ert* mín styrki.
5 Inn í hond tína líti eg upp anda mín: tú hevurt endurloyst meg, O HARRI Guð sannleiks.
6 Eg havi hatað teir sum geva gætur eftir lúgvandi fáfongdum: men eg líti á HARRAN.
7 Eg vil vera glaður og fegnast í tíni miskunn: tí at tú hevurt umhugsað trongd mína; tú hevurt kent mína sál í mótgongdum;
8 Og hevurt ikki innilokað meg inn í figgindans hond: tú hevurt sett mínar føtur í eitt stórt rúm.

9 Hav miskunn yvir meg, O HARRI, tí at eg eri í trongd: mítt eyga er upptært við harmi, *ja,* sál mín og kviður mín.

10 Tí mítt lív verður brúkt við harmi, og míni ár við suffan: mín styrki svitast uppá grund av míni misgerð, og míni bein eru upptærd.

11 Eg var ein skemd alra figginda mína millum, men serliga granna mína millum, og ein ótti fyri kennskapi mínum: teir, sum sóu meg fyri uttan, flýggjaðu frá mær.

12 Eg eri gloymdur sum ein deyður maður úti úr huga: eg eri sum eitt brotið ker.

13 Tí at eg havi hoyrt baktalið hjá mongum: ótti *var* á hvørjari síðu: meðan teir hildu ráðlegging saman ímóti mær, teir upphugsaðu at taka burtur mítt lív.

14 Men eg leit á teg, O HARRI: eg segði, Tú *ert* Guð mín.

15 Mínar tíðir *eru* í tíni hond: bjarga mær frá hondini á mínum figgindum, og frá teimum sum søkja at mær.

16 Fá títt andlit at skína uppá tænara tín: frels meg fyri miskunna tína sakir.

17 Lat meg ei verða til skammar, O HARRI; tí at eg havi kallað uppá teg: lat hinar vondu verða til skammar, *og* lat teir verða tigandi í grøvini.

18 Lat hinar lúgvandi varrar verða teptar; sum tala hervilig ting hugmóðiga og vanvirðisliga ímóti tí rættvísa.

19 *Á,* hvør mikil *er* góðska tín, sum tú hevurt lagt niðurfyri til teirra sum óttast teg; *hvørja* tú hevurt virkað til teirra sum líta á teg frammi fyri mannasonunum!

20 Tú skalt fjala teir í loyndini av tíni nærveru frá hugmóðini hjá manni: tú skalt varða teir loyniliga í eini tjaldbúð frá stríðinum av tungum.

21 Vælsignaður *veri* HARRIN: tí at hann hevur sýnt mær sína undrunarverdu blíðsemi í einum sterkum staði.

22 Tí at eg segði í mínum skundi, Eg eri skorin av frá frammi fyri eygum tínum: hóast hetta, tú hoyrdirt røddina á mínum umbøningum, tá ið eg rópti á teg.

23 O elskið HARRAN, allir tit heilagu hans: *tí at* HARRIN varðveitir hinar trúføstu, og ríkiliga lønir hinum stolta gerara.

24 Verið við gott mót, og hann skal styrkja tykkara hjarta, allir tit sum vóna á HARRAN.

PSÁLMUR 32

Ein Psálmur av Dávidi, Más'-chīl.

VÆLSIGNAÐUR *er hann, hvørs* misbrot *er* fyrigivið, *hvørs* synd *er* dekkað.

2 Vælsignaður *er* tann maður, hvørjum HARRIN tilroknar ikki misgerð, og í hvørs anda einkið svik *er.*

3 Tá ið eg helt tøgn, vuksu míni bein gomul gjøgnum mína ýlan tann líðilanga dag.

4 Tí at dag og nátt var hond tín tung uppiá mær: mín væta er vend yvirí summarturkin. Sē'-lâh.

5 Eg viðurkendi mína synd at tær, og mína misgerð havi eg ikki fjalt. Eg segði, Eg vil játta míni misbrot at HARRANUM; og tú fyrigavst misgerðina av míni synd. Sē'-lâh.

6 Fyri hetta skal hvør tann, sum er gudiligur, biðja til tín í eini tíð tá ið tú kanst verða funnin: vissuliga, í flóðunum av miklum vøtnum skulu teir ikki koma nær at honum.

7 Tú *ert* mítt goymistað; tú skalt varðveita meg frá trongd; tú skalt umringa meg umkring við útfrían-songum. Sē'-lâh.

8 Eg vil leiðbeina tær og læra teg í veginum sum tú skalt fara: eg vil vegleiða teg við mínum eyga.

9 Verið tit ikki sum hesturin, *ella* sum múldjórið, *sum* einkið skil hava: hvørs muður má verða hildin inni við meil og boygsli, at ikki teir komi nær at tær.

10 Mangar sorgir *skulu vera* til hins vonda: men hann, sum lítur á HARRAN, miskunn skal umringa hann umkring.

11 Verið glaðir í HARRANUM, og fegnist, tit rættvísu: og rópið av gleði, allir *tit sum eru* reiðiligir í hjarta.

PSÁLMUR 33

FEGNIST í HARRANUM, O tit rættvísu: *tí at* lov er sámiligt hjá teimum reiðiligu.

2 Prísið HARRANUM við hørpu: syngið at honum við psaltrinum *og* einum tíggju-streingja ljóðføri.

3 Syngið at honum ein nýggjan song; spælið hegnisligani við einum hørðum ljóði.

4 Tí at HARRANS orð *er* rætt; og øll hansara verk *eru* í sannleika *gjørd*.

5 Hann elskar rættvísi og dóm: jørðin er full av góðsemi HARRANS.

6 Við HARRANS orði vórðu himnarnir gjørdir; og alt herliðið av teimum við andadráttinum av hansara munni.

7 Hann savnar havsins vøtn saman sum eina rúgvu: hann leggur niðurfyri dýpdina í goymsluhús.

8 Øll jørðin óttist HARRAN: allir íbúgvar veraldarinnar standi í ærufrykt um hann.

9 Tí hann talaði, og tað varð *gjørt;* hann ábjóðaði, og tað stóð fast.

10 HARRIN førir ráð hinna heidnu til einkiðs: hann ger snildarráðini hjá fólkinum av ongari virkni.

11 HARRANS ráð stendur um ævir, hugsanirnar hjá hansara hjarta til allar ættir.

12 Vælsignað *er* tann tjóð, hvørs Guð HARRIN *er; og* tað fólk, *hvørt* hann hevur valt til sín egna arv.

13 HARRIN hyggur frá himni; hann skoðar allar mannasynirnar.

14 Frá plássinum av sínum bústaði hyggur hann uppá allar íbúgvar jarðarinnar.

15 Hann snikkar teirra hjørtu tillíka; hann umhugsar øll teirra verk.

16 Tað verður eingin kongur frelstur við fjøldleikanum av einum herliði: ein mektigur maður verður ikki bjargaður við nógvari styrki.

17 Eitt ross *er* eitt fáfongt ting til tryggleika: eiheldur skal hann bjarga *nøkrum* við síni miklu styrki.

18 Sí, HARRANS eyga *er* uppá teir sum óttast hann, uppá teir sum vóna á hansara miskunn;

19 Til at bjarga teirra sál frá deyða, og at halda teir á lívi í hungursneyð.

20 Okkara sál eftir HARRANUM bíðar: hann *er* vár hjálpari og várt skjøldur.

21 Tí at okkara hjarta skal fegnast í honum, av tí at vit hava troystað á hans heilaga navn.

22 Lat tína miskunn, O HARRI, vera uppiá okkum, samsvarandi sum vit vóna á teg.

PSÁLMUR 34

Ein Psálmur av Dávidi, tá ið hann broytti sína atferð frammi fyri Â-bí-mê-lěch-i; hvør rak hann burtur, og hann fór avstað.

EG vil vælsigna HARRAN til allar tíðir: hansara prís *skal* støðugt *vera* í mínum munni.

2 Mín sál skal gera sína rósan í HARRANUM: hinir eyðmjúku skulu hoyra *harum,* og verða glaðir.

3 O stórgerið HARRAN við mær, og latum oss upphevja hans navn tilsaman.

4 Eg søkti HARRAN, og hann

hoyrdi meg, og bjargaði mær frá øllum mínum óttum.
5 Teir hugdu á hann, og vórðu lýsnaðir: og teirra andlit skammaðust ikki.
6 Hesin fátæki maðurin rópti, og HARRIN hoyrdi *hann,* og frelsti hann burtur úr øllum hansara trongdum.
7 HARRANS eingil leirast rundan um teir sum óttast hann, og bjargar teimum.
8 O smakkið og síggið, at HARRIN *er* góður: vælsignaður *er* tann maður *sum* lítur á hann.
9 O óttist HARRAN, tit heilagu hans: tí at einkið trot *er* hjá teimum sum óttast hann.
10 Teimum ungu leyvunum trýtur, og *tær* líða hungur: men teimum, ið søkja HARRAN, skal ikki vanta nakað gott *ting*.
11 Komið, tit børn, lýðið á meg: eg vil læra tykkum ótta HARRANS.
12 Hvør maður *er hann sum* tráar lív, *og* elskar *mangar* dagar, at hann má sjá gott?
13 Halt tína tungu frá illum, og tínar varrar frá at tala svik.
14 Vík frá illum, og ger gott; søk frið, og stunda á hann.
15 HARRANS eygu *eru* uppá hinar rættvísu, og hans oyru *eru opin* at rópi teirra.
16 HARRANS andlit *er* ímóti teimum sum gera ilt, at skera av minnið um teir frá jørðini.
17 *Teir rættvísu* rópa, og HARRIN hoyrir, og teim bjargar burtur úr øllum teirra trongdum.
18 HARRIN *er* nær teimum sum eru av einum brotnum hjarta; og frelsir slíkar sum veri *seg* av einum knústum anda.
19 Mangar *eru* nívdir hins rættvísa: men HARRIN bjargar honum út úr teim øllum.
20 Hann varðar øll hansara bein: ikki ēitt av teimum verður brotið.
21 Ilt skal vega tann vonda: og teir, sum hata hin rættvísa, skulu verða oydnir.
22 HARRIN endurloysir sálina hjá sínum tænarum: og eingin av teimum, sum líta á hann, skulu verða oydnir.

PSÁLMUR 35

Ein Psálmur av Dávidi.

FØR *mína søk,* O HARRI, við teir sum stríðast við meg: berst ímóti teimum sum berjast ímóti mær.
2 Tak fatt á skjøldri og smáskjøldri, og statt upp til hjálp mína.
3 Drag út eisini spjótið, og tipp *vegin* ímóti teimum sum søkja at mær: sig við sál mína, Eg *eri* frelsa tín.
4 Lat teir verða fjamskaðar og gjørdar til skammar, sum søkja eftir míni sál: lat teir verða vendar tilbakar og førdar til ørkymlanar, sum upphugsa skaða mín.
5 Lat teir verða sum dumbu fyri vindinum: og lat eingil HARRANS elta *teir*.
6 Lat teirra veg verða myrkan og hálan: og lat HARRANS eingil søkja at teimum.
7 Tí uttan grund hava teir fjalt til mín sítt garn *í* eini holu, *sum* uttan grund teir hava grivið til mína sál.
8 Lat oyðing koma omanyvir hann óvarnandi; og lat hansara garn, sum hann hevur fjalt, fanga sjálvan hann: inn í sjálva ta oyðingina lat hann falla.
9 Og mín sál skal vera frødlig í HARRANUM: hon skal fegnast í frelsu hans.
10 Øll míni bein skulu siga, HARRI, hvør *er* líkur tær, sum bjargart hinum fátæka frá honum sum er ov sterkur fyri hann, ja, hinum fátæka og tørvandi frá honum sum rænir hann?
11 Følsk vitnir risu upp; tey

løgdu til mína ákæru *ting˘* sum eg vitsti ikki.
12 Teir endurgoldu mær ilt fyri gott *til* ræningina av míni sál.
13 Men hvat mær viðvíkur, tá ið teir vóru sjúkir, *var* sekkjaklæði mín klædnaður: eg eyðmýkti mína sál við føstu; og mín bøn vendi aftur inn í mín egna barm.
14 Eg bar meg at sum um *hann hevði verið* mín vinur *ella* bróðir: eg lútaði niður tungliga, eins og ēin sum syrgir *yvir* móður *sína*.
15 Men í mínum mótburði teir fegnaðust, og savnaðu seg saman: *ja,* hinir forkasti*lig*u savnaðu seg saman ímóti mær, og eg vitsti *tað* ikki; teir skræddu *í meg,* og góvust ikki:
16 Við hyklariskum háðarum í veitslum, gríslaðu teir uppá meg við tonnum sínum.
17 Harri, hvør leingi vilt tú líta at? bjarga míni sál frá teirra oyðingum, míni yndis frá leyvunum.
18 Eg vil veita tær tøkkir í hini miklu samkomu: eg vil prísa tær millum nógv fólk.
19 Lat ikki teir, sum eru mínir fíggindar rangliga, fegnast yvir mær: *eiheldur* lat teir blunka við eyganum, sum hata meg uttan grund.
20 Tí at teir tala ikki frið: men teir upphugsa svikafull mál ímóti *teimum sum eru* stillir í landinum.
21 Ja, teir upplótu munn sín vítt ímóti mær, *og* søgdu, Há, há, várt eyga hevur sæð *tað*.
22 *Hetta* hevurt tú sæð, O HARRI: halt ikki tøgn: O Harri, ver ikki fjart frá mær.
23 Ruska teg upp, og vakna til dóm mín, *enntá* at míni søk, Guð mín og Harri mín.
24 Døm meg, O HARRI Guð mín, samsvarandi við tína rættvísi; og lat teir ikki fegnast yvir mær.
25 Lat teir ikki siga í hjørtum sínum, Á, soleiðis vildu vit hava tað: lat teir ikki siga, Vit hava svølgt hann upp.
26 Lat teir verða skamm*full*ar og førdar til ørkymlanar tilsaman, sum fegnast yvir skaða mín: lat teir verða klæddar við skomm og vanæru, sum gera *seg* stórar ímóti mær.
27 Lat teir rópa av frøi, og verða glaðar, sum góðvilda mína rættvísu søk: ja, lat teir støðugt siga, Verði HARRAN stórgjørdur, sum hevur fragd í framgongdini hjá sínum tænara.
28 Og mín tunga skal tala um tína rættvísi *og* um títt prís allan dagin langan.

PSÁLMUR 36

Til hins hægsta Tónleikara, *Ein Psálmur* av Dávidi, tænara HARRANS.

MISBROT hins vonda sigur innan í hjarta mínum, *at tað er* eingin ótti fyri Guði frammi fyri eygum hansara.
2 Tí hann smikrar sær sjálvum í sínum egnu eygum, inntil hansara misgerð verði funnin at vera andskræmilig.
3 Orðini av hansara munni *eru* misgerð og svik: hann hevur lagt av at vera vísur, *og* at gera gott.
4 Hann upphugsar mein uppiá song síni; hann setur seg í einum vegi *sum er* ikki góður; honum stendst ikki við ilt.
5 Tín miskunn, O HARRI, *er* í himnunum; *og* tín trúfesti *røkkur* at skýggjunum.
6 Tín rættvísi *er* eins og hini miklu fjøll; tínir dómar *eru* eitt mikið dýpi: O HARRI, tú varðveitirt mann og djór.
7 Hvør avbær *er* tín elskandi blídni, O Guð! tí seta mannabørnini sítt álit undir skugga veingja tína.
8 Teir skulu verða ríkiliga mettaðir við fitinum av tínum húsi; og tú skalt fáa teir *at* drekka av ánni av tínum fragdum.

9 Tí hjá tær *er* lívsins kelda: í tínum ljósi skulu vit síggja ljós.
10 O halt áfram tína elskandi blídni at teimum sum kenna teg; og tína rættvísi til hini reiðiligu í hjarta.
11 Lat ikki hugmóðar fótin koma ímóti mær, og lat ikki hond teirra vondu firra meg.
12 Har eru misgerðar-virkararnir falnir: teir eru kastaðir niður, og skulu ikki vera førir fyri at rísa.

PSÁLMUR 37

Ein Psálmur av Dávidi.

ERGRA teg ikki uppá grund av illgerarum, eiheldur veri tú øvundsjúkur inná misgerðarvirkararnar.
2 Tí at teir skulu skjótt verða skornir niður líkasum grasið, og følna eins og hin grøna urt.
3 Lít á HARRAN, og ger gott; *so* skalt tú búgva í landinum, og sanniliga, tú skalt verða mataður.
4 Fragda tær eisini í HARRANUM; og hann skal geva tær tráirnar hjá tínum hjarta.
5 Lít HARRANUM vegir tínar til; lít eisini á hann; og hann skal fáa *tað* til at bera á.
6 Og hann skal føra fram tína rættvísi sum ljósið, og tín dóm sum middagin.
7 Hvíl í HARRANUM, og bíða tolmóðiga eftir honum: ergra teg ikki uppá grund av honum sum framgongur í sínum vegi, uppá grund av manninum sum fær vond uppáfund til at bera á.
8 Halt uppat frá firtni, og yvirgev vreiði: ergra teg ikki á nakran hátt til at gera ilt.
9 Tí at illgerarar skulu verða skornir av: men teir, sum bíða eftir HARRANUM, teir skulu arva jørðina.
10 Tí at enn eitt lítið bil, og hin vondi *skal* ikki *vera:* ja, tú skalt dúgliga umhugsa hansara pláss, og tað *skal* ikki *vera*.
11 Men hinir eyðmjúku skulu arva jørðina; og skulu fragda sær í ríkiligsemini av friði.
12 Hin vondi leggur loyniráð ímóti tí rættvísa, og grístar inná hann við sínum tonnum.
13 Harrin skal læa at honum: tí at hann sær, at hansara dagur kemur.
14 Hinir vondu hava drigið út svørðið, og hava spent sín boga, at kasta niður hin fátæka og tørvandi, *og* at vega slíkar ið veri *seg* av reiðiligum levnaði.
15 Teirra svørð skal innfara inn í teirra egna hjarta, og teirra bogar skulu verða brotnir.
16 Eitt sindur, sum ein rættvísur maður hevur, *er* betri enn ríkdómarnir hjá mongum vondum.
17 Tí at armar hinna vondu skulu verða brotnir: men HARRIN uppiheldur hinar rættvísu.
18 HARRIN kennir dagar hinna reiðiligu: og teirra arvur skal vera um ævir.
19 Teir skulu ei verða til skammar í hini óndu tíð: og í døgunum av hungursneyð skulu teir verða mettaðir.
20 Men hinir vondu skulu farast, og HARRANS figgindar *skulu vera* sum feittið av lombum: teir skulu upptærast; upp í royk skulu teir tærast burtur.
21 Hin vondi lænir, og rindar ikki aftur: men hin rættvísi sýnir miskunn, og gevur.
22 Tí at *slíkir, sum verði* vælsignaðir av honum, skulu arva jørðina; og *teir, sum verði* bannaðir av honum, skulu verða skornir av.
23 Fetini hjá einum *góðum* manni eru skipaði av HARRANUM: og hann fragdast í hansara vegi.
24 Hóast hann falli, skal hann ikki verða aldeilis kastaður niður: tí at HARRIN heldur *honum* uppi *við* síni hond.
25 Eg havi verið ungur, og *nú*

eri gamalur; tó havi eg ikki sæð hin rættvísa yvirgivnan, ella hansara sáð biddandi breyð.

26 *Hann er* ævir miskunnarfullur, og lænir; og hansara sáð *er* vælsignað.

27 Vík frá illum, og ger gott; og búgv um ævirmeir.

28 Tí at HARRIN elskar dóm, og yvirgevur ei sínar heilagu; teir verða varðveittir um ævir: men sáð teirra vondu skal verða skorið av.

29 Hinir rættvísu skulu arva landið, og búgva harí um ævir.

30 Muður hins rættvísa talar vísdóm, og hansara tunga talar um dóm.

31 Lóg Guðs hansara *er* í hjarta hansara; eingi av hansara fetum skulu glíða.

32 Hin vondi eygleiðir hin rættvísa, og roynir at vega hann.

33 HARRIN vil ikki lata hann *eftir* í hond hansara, ella fordøma hann tá ið hann verður dømdur.

34 Bíða eftir HARRANUM, og halt hansara veg, og hann skal upphevja teg til at arva landið: tá ið teir vondu verða skornir av, skalt tú sjá *tað*.

35 Eg havi sæð hin vonda í miklum mátti, og spreiðandi seg sjálvan sum eitt grønt vágstræ.

36 Tó gekk hann undir, og sí, hann *var* ikki: ja, eg søkti hann, men hann kundi ei verða funnin.

37 Merk *tær* tann fullkomna *mannin,* og skoða hin reiðiliga: tí at endin hjá *tí* manni *er* friður.

38 Men misbrótararnir skulu verða oyddir tilsaman: endi teirra vondu skal verða skorin av.

39 Men frelsa teirra rættvísu *er* av HARRANUM: *hann er* teirra styrki í tíðini av trongd.

40 Og HARRIN skal hjálpa teimum, og bjarga teimum: hann skal bjarga teimum frá teimum vondu, og frelsa teir, av tí at teir líta á hann.

PSÁLMUR 38

Ein Psálmur av Dávidi, til at føra til endurminningar.

O HARRI, harta meg ikki í tíni vreiði: eiheldur aga meg í tíni heitu misnøgd.

2 Tí at tínir ørvar stinga fast í meg, og tín hond trýstir meg sáran.

3 *Tað er* eingin heilnæmni í mínum kjøti uppá grund av tíni firtni; eiheldur *er nøkur* hvíld í mínum beinum uppá grund av míni synd.

4 Tí at mínar misgerðir eru farnar yvir mítt høvur: sum ein tung byrða eru tær ov tungar hjá mær.

5 Míni sár stinka *og* eru spilt uppá grund av mínum dárskapi.

6 Eg eri órógvaður; eg eri stórliga niðurboygdur; eg fari harmandi allan dagin langan.

7 Tí at mínar lendar eru fyltar við einum vamlisligum *sjúkdómi:* og *tað er* eingin heilnæmni í mínum kjøti.

8 Eg eri ússaligur og sára brotin: eg havi ýlt uppá grund av vankyrruni av mínum hjarta.

9 Harri, øll mín trá *er* frammi fyri tær; og mín eymkan er ikki fjald fyri tær.

10 Mítt hjarta dukar, mín styrki svitast mær: hvat viðvíkur ljósinum av mínum eygum, eisini tað er farið frá mær.

11 Mínir alskarar og mínir vinir standa í avstandi frá mínum sári; og mínir skyldmenn standa langt burturifrá.

12 Teir eisini, sum søkja eftir mínum lívi, leggja snerrur *til mín:* og teir, sum søkja mín skaða, tala meinsom ting, og ímynda svika*gerðir* allan dagin langan.

13 Men eg, sum ein deyvur *maður,* hoyrdi ikki; og *eg var* sum ein málleysur maður *sum* opnar ikki sín munn.

14 Svá var eg sum ein maður
sum hoyrir ikki, og í hvørs munni
ongar átalur *eru*.
15 Tí á teg, O HARRI, eg vóni:
tú vilt hoyra, O Harri Guð mín.
16 Tí at eg segði, *Hoyr meg,* at
ikki *annars* teir skuldu fegnast
yvir mær: tá ið fótur mín glíður,
teir geri *seg* stórar ímóti mær.
17 Tí at eg *eri* um at halta, og
mín sorg *er* støðugt frammi fyri
mær.
18 Tí at eg vil kunngera mína
misgerð; eg vil vera syrgin yvir
mína synd.
19 Men mínir fíggindar *eru* lív-
ligir, *og* teir eru sterkir: og teir,
sum hata meg við óréttum, eru
margfaldaðir.
20 Teir eisini, sum rinda ilt fyri
gott, eru mínir mótstandarar; av
tí at eg fylgi *tí tingi sum er* gott.
21 Yvirgev meg ikki, O HARRI:
O Guð mín, ver ikki fjart frá
mær.
22 Ger skjótt *av* at hjálpa mær,
O Harri mín frelsa.

PSÁLMUR 39

Til hins hægsta Tónleikara, *enntá* til
Jé'-dú-thún; Ein Psálmur av Dávidi.

EG segði, Eg vil geva gætur
eftir vegum mínum, at eg
syndi ikki við míni tungu: eg vil
halda mínum munni við einum
boygsli, meðan hin vondi er
frammi fyri mær.
2 Eg var málleysur við tøgn, eg
helt friði mínum, *enntá* frá góð-
um; og mín sorg varð rørd.
3 Mítt hjarta var heitt innan í
mær; meðan eg grundaði, brendi
eldurin: *tá* talaði eg við tungu
míni,
4 HARRI, fá meg at kenna mín
enda, og mátið á døgum mínum,
hvat tað *er; at* eg má vita hvussu
skirvin eg *eri*.
5 Sí, tú hevurt gjørt mínar dag-
ar *sum* eina hondbreidd; og mín
aldur *er* sum einkið frammi fyri
tær: sanniliga, hvør maður við
sín besta stand *er* fullkomilig fá-
fongd. Sé'-lâh.
6 Vissuliga, hvør maður gongur
í eini fáfongdari sýning: vissuliga,
teir eru órógvaðir til fánýtis: hann
hópar upp *ríkdómar,* og veit ikki
hvør skal savna teir.
7 Og nú, Harri, hvørjum bíði
eg eftir? mín vón *er* í tær.
8 Bjarga mær frá øllum mínum
misbrotum: ger meg ikki *til* spott
teirra fávitskutu.
9 Eg var málleysur, eg opnaði
ikki mín munn; av tí at tú gjørdirt
tað.
10 Firra títt høgg burtur frá
mær: eg eri upptærdur við stoyt-
inum av tíni hond.
11 Tá ið tú við hartanum rætt-
leiðirt mann fyri misgerð, fært
tú hansara vakurleika at tærast
burtur sum ein mølur: vissuliga,
hvør maður *er* fáfongd. Sé'-lâh.
12 Hoyr mína bøn, O HARRI,
og læn oyra at mínum rópi; halt
ikki tín frið yvirfyri tárum mín-
um: tí at eg *eri* ein fremmandur
hjá tær, *og* ein útiseti, eins og allir
fedrar mínir *vóru*.
13 O eir mær, at eg má endur-
vinna styrki, áðrenn eg fari hið-
ani, og verði ei meira.

PSÁLMUR 40

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

EG bíðaði tolmóðigani eftir
HARRANUM; og hann boygdi
seg at mær, og hoyrdi mítt róp.
2 Hann førdi meg upp eisini
burtur úr eini ræðuligari holu,
burtur úr hinum mýruta leiri, og
setti mínar føtur uppá ein klett,
og grundfesti mínar gongdir.
3 Og hann hevur lagt ein nýggjan sang í mín munn, *enntá*
Guði várum lov: mangir skulu
sjá *tað,* og óttast, og skulu líta á
HARRAN.
4 Vælsignaður *er* tann maður,

sum ger HARRAN *til* sítt álit, og metir ikki hin stolta, ella slíkar sum venda til viks til lygnir.

5 Mong, O HARRI Guð mín, *eru* tíni undurfullu verk *sum* tú hevurt gjørt, og tínar hugsanir *sum eru* mótvegis okkum: tey kunnu ikki verða roknaði upp í raðfylgju at tær: *um* eg vildi kunngjørt og talað *um tey,* eru tey fleiri enn kunnu verða upptøld.

6 Sláturoffur og offur tráaðirt tú ei; míni oyru hevurt tú opnað: brennioffur og syndoffur hevurt tú ikki kravt.

7 Tá segði eg, Sí, eg komi: í bókarbindinum *stendur tað* skrivað um meg,

8 Eg fragdist at gera tín vilja, O Guð mín: ja, tín lóg *er* innan í hjarta mínum.

9 Eg havi prædikað rættvísi í hini miklu samkomu: sí, eg havi ikki hildið aftur mínar varrar, O HARRI, tú veitst.

10 Eg havi ikki fjalt tína rættvísi innan í hjarta mínum; eg havi kunngjørt tína trúfesti og tína frelsu: eg havi ikki loynt tína elskandi blídni og tín sannleika frá hini miklu samkomu.

11 Afturhalt tú ikki tínar eymu miskunnir frá mær, O HARRI: lat tína elskandi blídni og tín sannleika støðugt varðveita meg.

12 Tí óteljilig illindir hava umringað meg umkring: mínar misgerðir hava tikið hald á mær, so at eg eri ikki førur fyri at hyggja upp; tær eru fleiri enn hár høvurs míns: tí svíkur mítt hjarta meg.

13 Lat *tær* lynda, O HARRI, at útfría meg: O HARRI, ger skjótt *av* at hjálpa mær.

14 Lat teir verða skamm*full*ar og ørkymlaðar tilsaman, sum søkja eftir míni sál til at oyða hana; lat teir verða riknar afturefter og gjørdar fyri skommum, sum ynskja mær ilt.

15 Lat teir verða oydnar til eitt endurgjald av síni skomm, sum siga við meg, Há, há.

16 Lat allar teir, sum søkja teg, fegnast og vera glaðar í tær: lat slíkar, sum elska tína frelsu, støðugt siga, veri HARRIN stórgjørdur.

17 Men eg *eri* fátækur og tørvandi; *tó* hugsar Harrin um meg: tú *ert* mín hjálp og mín útfríari; inn onga drálan, O Guð mín.

PSÁLMUR 41

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

VÆLSIGNAÐUR *er* hann, sum umhugsar hin fátæka: HARRIN vil bjarga honum í trongdartíð.

2 HARRIN vil varðveita hann, og halda honum á lívi; *og* hann skal vera vælsignaður uppiá jørðini: og tú vilt ikki geva hann yvir at viljanum hjá hansara figgindum.

3 HARRIN vil styrkja hann uppiá fáningar-songini: tú vilt reiða alla hansara song í hansara sjúkdómi.

4 Eg segði, HARRI, ver miskunnarfullur at mær: grø̨ð mína sál; tí at eg havi syndað ímóti tær.

5 Mínir figgindar tala ilt um meg, Nær skal hann doyggja, og hansara navn farast?

6 Og um hann komi at hitta *meg,* talar hann fáfongd: hansara hjarta savnar misgerð til sín sjálvs; *tá ið* hann fer útum, sigur hann frá *ti.*

7 Allir, sum hata meg, teska tilsaman ímóti mær: ímóti mær teir upphugsa mín skaða.

8 Ein illur sjúkdómur, *siga teir,* krøkist fast at honum: og *nú,* ið hann liggur, skal hann rísa upp ei meira.

9 Ja, mín egni vælkunnigi vinur, á hvønn eg leit, sum át av breyði mínum, hevur lyft upp *sín* hæl ímóti mær.

10 Men tú, O HARRI, ver mis-

kunnarfullur at mær, og reis meg upp, at eg má viðurgjalda teimum.

11 Við hesum eg veit, at tú *hevurt* tokka *í* mær, av tí at mín fíggindi fegnast ikki í siguri yvir mær.

12 Og hvat mær viðvíkur, tú uppiheldurt mær í mínum heilleika, og seturt meg frammi fyri tínum andliti um ævir.

13 Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Ísraels frá ævigtvarandi, og til ævigtvarandi. Á-měn, og Á-měn.

PSÁLMUR 42

Til hins hægsta Tónleikara,
Más-chīl, fyri Kōr-ăh synir.

EINS og hjørturin stundar eftir vatnsløkunum, soleiðis stundar sál mín eftir tær, O Guð.

2 Míni sál tyrstir eftir Guði, eftir hinum livandi Guði: nær skal eg koma og birtast frammi fyri Guði?

3 Míni tár hava verið mín matur dag og nátt, meðan teir støðugt siga við meg, Hvar *er* Guð tín?

4 Tá ið eg minnist hesi *ting*, helli eg út mína sál í mær: tí at eg var farin við fjøldini, eg fór við teimum til húsar Guðs, við røddini av frøi og *lov*prísan; við eini fjøld sum helt halgidag.

5 Hví ert tú niðurboygd, O mín sál? og *hví* ert tú órógvað í mær? vóna tú á Guð: tí at eg skal enn prísa honum *fyri* hjálpina av hans ásjón.

6 O Guð mín, mín sál er niðurboygd innan í mær: tí vil eg minnast til tín frá landi Jordans, og Hĕr-mô-nīt-anna, frá heygnum Mī-zâr.

7 Djúp kallar á djúp við ljóðið av tínum vatnsprænum: allar tínar aldur og tínar bylgjur eru gingnar yvir meg.

8 *Tó* vil HARRIN skipa síni elskandi blídni um dagsleitið, og um náttina *skal* hansara sangur *vera* hjá mær, *og* mín bøn til Guð lívs míns.

9 Eg vil siga við Guð mín klett, Hví hevurt tú gloymt meg? hví gangi eg harmandi uppá grund av figgindans kúgan?

10 *Sum* við einum svørði í mínum beinum, lasta mínir fíggindar meg; meðan teir dagliga siga við meg, Hvar *er* Guð tín?

11 Hví ert tú niðurboygd, O mín sál? og hví ert tú órógvað innan í mær? vóna tú á Guð: tí at eg skal enn prísa honum, *sum*[p] *er* heilsan av míni ásjón, og mín Guð.

PSÁLMUR 43

DØM meg, O Guð, og før mína søk ímóti eini óguðiligari tjóð: O bjarga mær frá hinum svikfulla og órættláta manni.

2 Tí at tú *ert* Guð styrki mínar: hví kastart tú meg av? hví gangi eg harmandi vegna figgindans kúgan?

3 O send út títt ljós og tín sannleika: lat tey leiða meg; lat tey føra meg at tínum heilaga hóli, og til tabernakkul tíni.

4 Tá vil eg fara at altari Guðs, at Guði — míni ovurhonds frøi: ja, uppá hørpuna vil eg prísa tær, O Guð mín Guð.

5 Hví ert tú niðurboygd, O mín sál? og hví ert tú órógvað innan í mær? vóna á Guð: tí at eg skal enn prísa honum, *sum*[p] *er* heilsan av míni ásjón, og mín Guð.

PSÁLMUR 44

Til hins hægsta Tónleikara
fyri Kōr-ăh synir, Más-chīl.

VÆR høvum hoyrt við oyrum várum, O Guð, várir fedrar hava sagt okkum, *hvat* verk tú gjørdirt á døgum teirra, í hinum gomlu tíðum.

2 *Hvussu* tú rakst út hinar heidnu við tíni hond, og plantaðirt

teir; *hvussu* tú nívdirt fólkið, og kastaðirt teir út.
3 Tí at teir fingu ikki landið í ogn viðˆ sínum egna svørði, eiheldur frelsti teirra egni armur teir: men høgra hond tín, og armur tín, og ljós ásjónar tínar, av tí at tú hevðirt ein tokka at teim.
4 Tú ert mín Kongur, O Guð: ábjóða útfríingar til Jákobs.
5 Ígjøgnum teg vilja vit trýsta niður okkara fíggindar: ígjøgnum títt navn vilja vit traðka teir undir sum rísa upp ímóti okkum.
6 Tí eg vil ikki líta á boga mín, eiheldur skal svørð mítt bjarga mær.
7 Men tú hevurt bjargað okkum frá okkara fíggindum, og hevurt gjørt teir til skammar sum hataðu okkum.
8 Í Guði rósa vit *okkum* allan dagin langan; og prísa tínum navni um ævir. Sē´·lâh.
9 Men tú hevurt kastað av, og gjørt okkum til skammar; og fert ikki fram við herum várum.
10 Tú fært okkum at venda tilbakar frá fíggindanum: og teir, ið hata okkum, ræna til síns sjálvs.
11 Tú hevurt givið okkum sum seyð — *útnevndur* til matnað; og hevurt spjatt okkum hinna heidnu millum.
12 Tú selurt títt fólk fyri einkið, og økirt ikki *um tín eyð* viðˆ teirra prísi.
13 Tú gert okkum *til* eitt spott fyri okkara grannum; eitt háð og eitt spæ fyri teimum sum eru rundan um okkum.
14 Tú gert okkum *til* eitt speiorð hinna heidnu millum, ein risting av høvdinum millum fólksins.
15 Mín ørkymlan *er* støðugt frammi fyri mær, og skommin av mínum andliti hevur dekkað meg,
16 Vegna rødd hansara sum brigslar og Guðsspottar; uppá grund av fíggindanum og hevnaranum.
17 Alt hetta er komið uppá okkum; tó hava vit ikki gloymt teg, eiheldur hava vit handlað falsliga í tínum sáttmála.
18 Okkara hjarta er ikki vent tilbakar, eiheldur hava okkara fet hildið undan frá vegi tínum;
19 Hóast tú hevurt sára brotið okkum í plássi dreka˘, og dekkað okkum við deyðans skugga.
20 Um vit hava gloymt navn Guðs várs, ella rætt út okkara hendur til ein fremmandan gud;
21 Skal ikki Guð kanna hetta út? tí at hann kennir loyndarmál˘ hjartans.
22 Ja, fyri tína skyld verða vit dripnir allan dagin langan; vit verða roknaðir sum seyður til slátringina.
23 Vakna, hví svevurt tú, O Harri? reis *teg,* kasta *okkum* ikki av um ævir.
24 Hví fjalirt tú andlit títt, *og* gloymirt okkara nívd og okkara kúgan?
25 Tí at okkara sál er boygd niður til støvið: okkara kviður krøkist at jørðini.
26 Reis *teg* til okkara hjálp, og endurloys okkum fyri miskunnar tínar sakir.

PSÁLMUR 45

Til hins hægsta Tónleikara uppá Sjô-sjănn´·ĭm, fyri Kôr´·ăh synir, Mās´-chĭl, ein sangur um alskir.

MÍTT hjarta setur saman eitt gott málevni: eg tali um tey tingini sum eg havi gjørt viðvíkjandi konginum: mín tunga *er* pennurin hjá einum førum skrivara.
2 Tú ert fagrari enn mannabørnini: náði er helt út í varrar tínar: tí hevur Guð teg vælsignað um ævir.
3 Gyrð svørð títt uppá lend *tína,* O *mest* mektigi, við tíni dýrd og tíni hátign.
4 Og í tíni hátign ríð fram-

gongdarsamligani vegna sannleika og eyðmjúkleika *og* rættvísi; og tín høgra hond skal læra teg ræðulig ting.

5 Tínar ørvar *eru* hvassar í hjartanum á kongsins figgindum; *hvarviðˆ* fólkið fellur undir tær.

6 Títt hásæti, O Guð, *er* um ævir og ævir: sproti kongadømis tíns *er* ein rættur sproti.

7 Tú elskart rættvísi, og hatart vondsku: tí hevur Guð, tín Guð, teg salvað vil gleðisoljuni uppum tínar felagar.

8 Øll tíni klæðir *anga* av myrrhu, og alǒeum, *og* cassiu, úr fílabeinsslottunum, hvarviðˆ tey hava gjørt teg glaðan.

9 Kongadøtur *vóru* millum heiðursomu kvenna tína: uppá tína høgru hond stóð drotningin í gulli úr Ǒ′-phīr.

10 Lýð á, O dóttir, og umhugsa, og boygg oyra títt; gloym eisini títt egna fólk, og hús faðirs tíns;

11 So skal kongurin stórligani tráa tín vakurleika: tí at hann *er* tín Harri; og tilbið tú hann.

12 Og dóttirin hjá Týrus *skal vera har* við eini gávu; *enntá* hini ríku millum fólksins skulu nøla tín tokka.

13 Dóttir kongsins *er* øll dýrdsom innan: hennara klædnaður *er* úr virkaðum gulli.

14 Hon skal verða førd at konginum í klæði av nálararbeiði: jomfrúgvarnar, hennara felagar sum fylgja henni, skulu verða førdar at tær.

15 Við gleði og fagnan skulu tær verða førdar: tær skulu innfara inn í slott kongsins.

16 Ístaðin fyri fedrar tínar skulu vera tíni børn, sum tú kanst gera *til* prinsar á allari jørðini.

17 Eg vil fáa navn títt at verða mint til í øllum ættum: tí skal fólkið tær prísa um ævir og ævir.

PSÁLMUR 46

Til hins hægsta Tónleikara fyri Kōr′-āh synir, Ein Sangur uppá Ăl′-ă-mōth.

GUÐ *er* várt skjól og styrki, ein sera nærverandi hjálp í trongd.

2 Tí vilja ikki vit óttast, tó *at* jørðin verði *seg* burtflutt, og tó *at* fjøllini verði borin inn í havsins mittu;

3 *Tó at* vøtnini harav ýli *og* verði órógvaði, *tó at* fjøllini risti við bólgningini harav. Sē′-lâh.

4 *Tað finst* ein á, streymarnir av hvørji skulu gera glaðan Guðs stað, tað heilaga *plássið* av tabernaklunum hjá tí mest Høga.

5 Guð *er* í miðjuni av henni; hon skal ikki verða vikað: Guð skal hjálpa henni, *og tað* heilt tíðliga.

6 Hinir heidnu leikaðu óðir, kongadømini vórðu vikaði: hann mælti síni rødd, jørðin smeltaði.

7 HARRI herliðanna *er* við okkum; Guð Jákobs *er* okkara skjól. Sē′-lâh.

8 Komið, skoðið verkini hjá HARRANUM, hvørjar oyðingar hann hevur gjørt á jørðini.

9 Hann fær bardagar at halda uppat at enda jarðarinnar; hann brýtur bogan, og sker spjótið sundur; hann brennur *her*vagnin í eldinum.

10 Verið stillir, og vitið, at eg *eri* Guð: eg vil verða upphevjaður millum hinna heidnu, eg vil verða upphevjaður á jørðini.

11 HARRI herliðanna *er* við okkum; Guð Jákobs *er* skjól okkara. Sē′-lâh.

PSÁLMUR 47

Til hins hægsta Tónleikara, Ein Psálmur fyri Kōr′-āh synir.

OKLAPPIÐ tykkara hendur, øll tit fólk; rópið á Guð við røddini av stórsigri.

2 Tí at HARRIN mest høgi *er* øgiligur; *hann er* ein mikil Kongur yvir allari jørðini.
3 Hann skal undirleggja fólkið undir okkum, og tjóðirnar undir okkara føtur.
4 Hann skal velja váran arv til okkara; Jákobs avbærni, hvønn hann elskaði. Sɛ́lâh.
5 Guð er farin upp við einum rópi, HARRIN við ljóðinum av einum lúðri.
6 Syngið *lov*prís*ing*ar til Guðs, syngið *lov*prís*ing*ar: syngið Kongi várum *lov*prís*ing*ar, syngið *lov*prís*ing*ar.
7 Tí at Guð *er* Kongurin av allari jørðini: syngið tit *lov*prís*ing*ar við skili.
8 Guð ríkir yvir hinum heidnu: Guð situr uppiá hásætinum av sínum heilagleika.
9 Prinsarnir hjá fólkinum eru savnaðir saman, *enntá* fólkið hjá Guði Ábrahams: tí at jarðarinnar skjøldrar *tilhoyra* Guði: hann er stórliga upphevjaður.

PSÁLMUR 48

Ein Songur *og* Psálmur
fyri Kɔ́r-âh synir.

STÓRUR *er* HARRIN, og stórligani at verða prísaður í staði Guðs várs, *á* fjalli heilagleika hans.
2 Vakurt fyri staðseting, frøin hjá allari jørðini, *er* Zion fjall, *á* síðum norðursins, staður hins mikla Kongs.
3 Guð er kendur í hennara slottum fyri eitt skjól.
4 Tí at sí, kongarnir vóru fylkjaðir, teir fóru framvið tilsaman.
5 Teir sóu *tað*, *og* so undraðust teir; teir vórðu órógvaðir, *og* skundaðu avstað.
6 Ótti tók hald uppá teir har, *og* pína, sum hjá eini kvinnu í verkjum.
7 Tú brýturt skipini úr Tarsjisj við einum eystanvindi.
8 Eins og vit hava hoyrt, soleiðis hava vit sæð í staði HARRA herliðanna, í staði Guðs várs: Guð vil grundfesta hann um ævir. Sɛ́lâh.
9 Vit hava hugsað um tína elskandi blíðsemi, O Guð, í miðjum templi tínum.
10 Samsvarandi við navn títt, O Guð, so *er* títt prís at endum jarðarinnar: tín høgra hond er full av rættvísi.
11 Lat Zion fjall fegnast, lat Judah døtur gleðast, uppá grund av dómum tínum.
12 Gangið um Zion, og farið rundan um hana: teljið tornini harhjá.
13 Merkið tit *tykkum* væl hennara vígvirkir, umhugsið slottˇ hennara; at tit mega siga *tað* fyri hini fylgjandi ætt.
14 Tí at hesin Guð *er* Guð vár um ævir og ævir: hann vil vera okkara leiðbeinari *enntá* at deyða.

PSÁLMUR 49

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur fyri Kɔ́r-âh synir.

HOYRIÐ hetta, øll *tit* fólk; lænið oyra, allir *tit* íbúgvar veraldarinnar:
2 Bæði lágir og høgir, ríkir og fátækir, tilsaman.
3 Mín muður skal tala um vísdóm; og grundingin av mínum hjarta *skal vera* um skil.
4 Eg vil boyggja mítt oyra til eina dømisøgu: eg vil opna mína myrku framsøgn uppá hørpuna.
5 Hví skuldi eg óttast í døgum ill*skapar*ins, *tá ið* misgerðin av mínum hælum skal umringa meg umkring?
6 Teir, sum líta á sín ríkdóm, og rósa sær í fjøldini av sínum ríkdómum;
7 Eingin *av teimum* kann viðˆ

nøkrum brøgdum endurloysa bróður sín, ella geva til Guðs eitt loysigjald fyri hann:
8 (Tí at endurloysingin av teirra sál *er* dýrabær, og tað heldur upp-at um ævir:)
9 At hann skuldi enn liva um ævir, *og* ei síggja rot.
10 Tí at hann sær, *at* vísir menn doyggja, somuleiðis dárin og hin óskynski persónurin farast, og eftirlata sín eyð til aðrar.
11 Teirra innvortis hugsan *er, at* teirra hús *skulu halda áfram* um ævir, *og* teirra búpláss˘ til allar ættir; teir kalla *sínar* jarðir eftir sínum egnu nøvnum.
12 Hóast hetta, maður, *sum er* í heiðuri, verður ikki *verandi:* hann er líka *sum* djórini *sum* týnast.
13 Hesin teirra vegur *er* teirra dárskapur: teirra eftirkoming tó viðurkenna teirra framsagnir. Sē´-lâh.
14 Líka *sum* seyður verða teir lagdir í grøvina; deyði skal mata *sær* á teimum; og hinir reiðiligu skulu hava harradømi yvir teimum um morgunin; og teirra vakurleiki skal tærast í grøvini frá teirra býli.
15 Men Guð vil endurloysa mína sál frá mátti gravarinnar: tí at hann skal taka ímóti mær. Sē´-lâh.
16 Vert ikki tú ræddur, tá ið ēin verður gjørdur ríkur, tá ið dýrdin av hansara húsi verður økt;
17 Tí at tá ið hann doyr, skal hann einkið bera burtur: hansara dýrd skal ikki stíga niður eftir honum.
18 Hóast meðan hann livdi, hann vælsignaði sína sál: og *menn* vilja prísa tær, tá ið tú gert væl móti tær sjálvum.
19 Hann skal fara til ætt fedra sína; teir skulu aldri sjá ljós.
20 Maður, *sum er* í heiðuri, og skilur ikki, er líka *sum* djórini *sum* týnast.

PSÁLMUR 50

Ein Psálmur av Á-sāph-i.

HIN mektigi Guð, *enntá* HARRIN, hevur talað, og kallað jørðina frá rísing sólarinnar at hennara niðurfaring.
2 Út úr Zion, fullkominleika vakurleikans, hevur Guð skinið.
3 Okkara Guð skal koma, og skal ei halda tøgn: ein eldur skal tæra frammanfyri honum, og tað skal vera sera ódnarsamt rundan um hann.
4 Hann skal kalla til himnarnar frá *í* erva, og til jørðina, at hann má døma sítt fólk.
5 Savnið mínar heilagu saman at mær; teir sum hava gjørt ein sáttmála við meg við sláturofri.
6 Og himnarnir skulu kunngera hansara rættvísi: tí at Guð *er* dómari sjálvur. Sē´-lâh.
7 Hoyr, O fólk mítt, og eg vil tala; O Ísrael, og eg vil vitna ímóti tær: eg *eri* Guð, *enntá* tín Guð.
8 Eg vil ikki átala teg fyri tíni sláturoffur ella tíni brennioffur, *fyri* áframhaldandi *at hava verið* frammanfyri mær.
9 Eg vil ongan ungtarv taka út úr húsi tínum, *ella* geitarbukkar út úr byrgjum tínum.
10 Tí at hvørt skógarins djór *er* mítt, *og* fenaðurin uppiá túsund hólum.
11 Eg kenni allar fjallanna fuglar: og akursins villdjór *eru* míni.
12 Um eg var svangur, vildi eg ikki sagt tær: tí at verøldin *er* mín, og hennara fylling.
13 Vil eg eta kjøtið av tarvum, ella drekka blóðið av geitum?
14 Ofra Guði takkarveitan; og gjald tíni heitstreingir at hinum mest Høga:
15 Og kalla uppá meg á degi trongdarinnar: eg vil útfría teg, og tú skalt dýrðmeta meg.

16 Men við hin vonda sigur Guð, Hvat hevurt tú *við* at gera at kunngera mínar ásetingar, ella *at* tú skuldirt tikið mín sáttmála í tín munn?

17 Við tað *at* tú hatart leiðbeining, og kastart míni orð aftur um teg.

18 Tá ið tú sást ein tjóv, tá samtyktirt tú við hann, og hevurt verið luttakari við horfremjarum.

19 Tú gevurt tín munn til ilt, og tín tunga myndar svik.

20 Tú siturt *og* talart ímóti bróður tínum; tú baktalart son egnu móður tínar.

21 Hesi *ting* hevurt tú gjørt, og eg helt tøgn; tú heltst, at eg var aldeilis *ēin slíkur* sum tú sjálvur: *men* eg vil írættaseta teg, og seta *tey* í rættlag frammi fyri eygum tínum.

22 Nú, umhugsið hetta, tit sum gloyma Guð, at ikki eg skræði *tykkum* í stykkir, og *tað veri* eingin at bjarga.

23 Hvør*iðso* ofrar lov, dýrðmetir meg: og fyri honum, sum skipar *sína* atferð *tilrættis,* vil eg sýna Guðs frelsu.

PSÁLMUR 51

Til hins hægsta Tónleikara; Ein Psálmur av Dávidi, tá ið Náthan prophetur kom at honum, eftir *at* hann var farin inn til Bāth'-sjē-bŭ.

HAV miskunn yvir meg, O Guð, samsvarandi við tína elskandi blídni: sambært fjøldini av tínum eymu miskunnum, sletta út míni misbrot.

2 Tváa meg dyggiliga frá míni misgerð, og reinsa meg frá míni synd.

3 Tí at eg viðurkenni míni misbrot: og mín synd *er* ævir frammi fyri mær.

4 Ímóti tær, tær eina, havi eg syndað, og gjørt *hetta* illa í tíni eygsjón: at tú máttirt vera rættvísgjørdur tá ið tú talart, *og* vera skírur tá ið tú dømirt.

5 Sí, eg varð myndaður í misgerð; og í synd ól fram móðir mín meg.

6 Sí, tú tráart sannleika í hinum innvortis pørtunum: og í tí fjalda *partinum* skalt tú fáa meg at kenna vísdóm.

7 Reinska meg við ýsopi, og eg skal vera reinur: tváa meg, og eg skal vera hvítari enn snjó.

8 Fá meg at hoyra frøi og gleði; *at* beinini, *sum* tú hevurt brotið, mega fegnast.

9 Fjal andlit títt frá mínum syndum, og sletta út allar mínar misgerðir.

10 Skapa í mær eitt reint hjarta, O Guð; og endurnýggja ein rættan anda innan í mær.

11 Kasta meg ikki burtur frá nærveru tíni; og tak ikki tín heilaga anda mær frá.

12 Endurbøt mær frøi frelsu tínar; og halt mær uppi *við tínum* fría anda.

13 *Tá* vil eg læra misbrótarar tínar vegir; og syndarar skulu verða umvendir at tær.

14 Útfría meg frá blóðskyldugleika, O Guð, tú Guð frelsu mínar: *og* mín tunga skal syngja hart um rættvísi tína.

15 O Harri, opna tú mínar varrar; og mín munnur skal sýna fram títt prís.

16 Tí at tú tráart ikki sláturoffur; annars vildi eg givið *tað:* tú fragdarst ikki í brenniofri.

17 Sláturofrini hjá Guði *eru* ein brotin andi: eitt brotið og eitt sundurknúst hjarta, O Guð, vilt tú ikki vanvirða.

18 Ger gott í tínum góða tokka innat Zion: byggi tú múrar Jerusalems.

19 Tá skalt tú vera nøgdur við sláturofrini av rættvísi, við brennioffur og heilt brennioffur: tá skulu teir ofra ungtarvar uppiá tínum altari.

PSÁLMUR 52

Til hins hægsta Tónleikara, Mās´-chīl, *Ein Psálmur* av Dávidi, tá ið Dó´-ēg Ê-dóm-īt´-i kom og segði Sauli frá, og segði við hann, Dávid er komin til húsar Á-hīm´-ē-lēch-s.

HVÍ rósart tú tær í skaða, O mektigi maður? Guðs góðska *varir* støðugt.

2 Tín tunga upphugsar skaðar; líka *sum* eitt hvast skurðarblað, virkandi svikaliga.

3 Tú elskart ilt meiri enn gott; *og* lúgving, heldur enn at tala rættvísi. Sē´-lâh.

4 Tú elskart øll upptærandi orð, O *tú* svikfulla tunga.

5 Guð skal líkaleiðis oyða teg um ævir, hann skal taka teg burtur, og slíta teg úr *tínum* bústaði, og taka teg upp *við* rót úr landi teirra livandi. Sē´-lâh.

6 Hinir rættvísu eisini skulu síggja, og óttast, og skulu læa eftir honum:

7 Sí, *hesin er* maðurin *sum* ei gjørdi Guð sína styrki; men leit á ríkiligsemina av sínum ríkidømum, *og* styrkti seg í síni vondsku.

8 Men eg *eri* sum eitt grønt olivintræ í Guðs húsi: eg líti á Guðs miskunn um ævir og ævir.

9 Eg vil prísa tær um ævir, av tí at tú hevurt gjørt *tað:* og eg vil bíða eftir navni tínum; tí at *tað er* gott frammi fyri heilagu tínum.

PSÁLMUR 53

Til hins hægsta Tónleikara uppá Má´-hâ-lāth, Mās´-chīl, *Ein Psálmur* av Dávidi.

DÁRIN hevur sagt í hjarta sínum, Eingin Guð *er*. Spiltir teir eru, og hava gjørt andstyggiliga misgerð: *tað er* eingin sum ger gott.

2 Guð hugdi niður frá himni uppá mannabørnini, at sjá um tað vóru *nakrir* sum skiltu, sum søktu Guð.

3 Hvør *og* ēin av teimum er farin tilbakar: teir eru allir samlir vorðnir gravskitnir; *tað er* eingin sum ger gott, nei, ikki ēin.

4 Hava misgerðar-virkararnir ongan kunnleika? sum eta upp fólk mítt *sum* teir eta breyð: teir hava ikki kallað uppá Guð.

5 Har vóru teir í miklum ótta, *hvar* eingin ótti var: tí at Guð hevur spjatt beinini hjá honum sum leirast *ímóti* tær: tú hevurt gjørt *teir* til skammar, av tí at Guð hevur vanvirt teir.

6 Á, at Ísraels frelsa *var komin* út úr Zion! Tá ið Guð førir aftur fangaskap fólks síns, Jákob skal fegnast, *og* Ísrael skal vera glaður.

PSÁLMUR 54

Til hins hægsta Tónleikara á Nē´-gī-nōth, Mās´-chīl, *Ein Psálmur* av Dávidi, tá ið Ziphimarnir komu og søgdu til Sauls, Fjalir ikki Dávid seg hjá okkum?

FRELS meg, O Guð, við navni tínum, og døm meg við styrki tíni.

2 Hoyr mína bøn, O Guð; læn oyra til orðini av mínum munni.

3 Tí at fremmandir eru risnir upp ímóti mær, og kúgarar søkja eftir sál míni: teir hava ikki sett Guð frammi fyri sær. Sē´-lâh.

4 Sí, Guð *er* mín hjálpari: Harrin *er* við teimum ið halda uppi míni sál.

5 Hann skal endurgjalda ilt at mínum figgindum: sker teir av í sannleika tínum.

6 Eg vil frælsliga sláturofra at tær: eg vil prísa navni tínum, O HARRI; tí at *tað er* gott.

7 Tí at hann hevur bjargað mær burtur úr allari trongd: og mítt eyga hevur sæð *sína trá* uppá mínar figgindar.

PSÁLMUR 55

Til hins hægsta Tónleikara á Nē´-gī-nōth, Mās´-chīl, *Ein Psálmur* av Dávidi.

LÆN oyra til mína bøn, O Guð; og fjal ikki teg sjálvan frá míni umbønan.

2 Gáa at mær, og hoyr meg: eg harmist í míni klagu, og geri eitt ljóð;
3 Uppá grund av fíggindans rødd, uppá grund av kúgan teirra vondu: tí at teir kasta misgerð uppá meg, og í vreiði teir hata meg.
4 Mítt hjarta er sára pínt innan í mær: og deyðans ræðslur eru falnar uppá meg.
5 Ekkafullsemi og nøtran eru komin uppá meg, og ræðsla hevur floymt yvir meg.
6 Og eg segði, Á, at eg hevði veingir sum ein dúgva! *tí at tá* vildi eg flogið avstað, og verið við hvílu.
7 Sí, *tá* vildi eg reikað langt burtur, *og* verðið verandi í oyðuni. Sē´-lâh.
8 Eg vildi skundað mína rýming frá hinum vindsama stormi *og* ódnarvindi.
9 Oyð, O Harri, *og* deil teirra tungur: tí at eg havi sæð harðskap og klandur í staðinum.
10 Dag og nátt teir fara íkring hann uppiá múrunum harav: skaði eisini og sorg *eru* í miðjuni harav.
11 Vondska *er* í miðjuni harav: fals og svik víkja ikki frá hennara gøtum.
12 Tí at *tað var* ikki ein fíggindi, *sum* lastaði meg; tá kundi eg havt borið *tað:* eiheldur *var tað* hann, sum hataði meg, *sum* gjørdi *seg* stóran ímóti mær; tá vildi eg havt fjalt meg sjálvan frá honum:
13 Men *tað vart* tú, ein maður mín javningi, mín leiðbeinari, og kunningi mín.
14 Vit hildu søtt ráð saman, *og* gingu at húsi Guðs í samlagi.
15 Lat deyða leggjast á teir, *og* lat teir fara niður skjótt inn í helviti: tí at vondska *er* í teirra býlum, *og* teirra millum.
16 Hvat viðvíkur mær, eg vil kalla uppá Guð; og HARRIN skal frelsa meg.
17 Kvøld, og morgun, og um middag, vil eg biðja, og rópa hart: og hann skal hoyra mína rødd.
18 Hann hevur bjargað míni sál í friði frá bardaganum *sum var* ímóti mær: tí at tað vóru mangir við mær.
19 Guð skal hoyra, og níva teir, enntá hann ið verður úr fordum. Sē´-lâh. Av tí at teir ongar broytingar hava, tí óttast teir ikki Guð.
20 Hann hevur sett fram sínar hendur ímóti slíkum sum veri í friði við hann: hann hevur brotið sín sáttmála.
21 *Orðini* av hansara munni vóru mjúkari enn smør, men kríggj *var* í hansara hjarta: hans orð vóru mjúkari enn olja, tó *vóru* tey drigin svørð.
22 Kasta tína byrði uppá HARRAN, og hann skal halda tær uppi: hann skal aldri loyva tann rættvísa at verða vikaðan.
23 Men tú, O Guð, skalt føra teir niður inn í holu oyðingarinnar: blóðigir og svikafullir menn skulu ikki liva út helvtina av døgum sínum; men eg vil líta á teg.

PSÁLMUR 56

Til hins hægsta Tónleikara uppá Jó´-năth-ĕ´-lĕm-rē-chŏ´-kīm, Mĭch´-tăm av Dávidi, tá ið Philistarnir tóku hann í Gáth.

VER miskunnarfullur at mær, O Guð: tí at maður vildi svølgt meg upp; hann, kempandi dagligani, kúgar meg.
2 Mínir fíggindar vildu dagliga svølgt *meg* upp: tí at *teir veri seg* mangir sum berjast ímóti mær, O tú mest Høgi.
3 Ta tíð eg ræddur eri, eg vil líta á teg.
4 Í Guði vil eg prísa hans orði, á Guð havi eg sett mítt álit; eg vil ikki óttast hvat kjøt kann gera mær.
5 Hvønn dag teir brongla míni orð: allir teirra tankar *eru* ímóti mær til ilt.

6 Teir savna seg saman, teir fjala seg, teir merkja *sær* míni fet, tá ið teir bíða eftir míni sál.

7 Skulu teir komast undan viðˆ misgerð? í *tíni* firtni kasta niður fólkið, O Guð.

8 Tú telurt mínar reikingar: koyr tú míni tár í tína fløsku: *eru tey* ikki í tíni bók?

9 Tá ið eg geyli *á teg*, tá skulu mínir figgindar venda tilbakar: hetta eg veit; tí at Guð *er* fyri mær.

10 Í Guði vil eg prísa *hans* orði: í HARRANUM vil eg prísa *hans* orði.

11 Á Guð havi eg sett mítt álit: eg vil ei vera ræddur hvat maður kann gera mær.

12 Tíni heitstreingir *eru* uppiá mær, O Guð: eg vil veita tær *lov*prísing*ar*.

13 Tí at tú hevurt bjargað míni sál frá deyða: *vilt* ikki *tú bjarga* mínum fótum frá at falla, at eg má ganga frammi fyri Guði í ljósi teirra livandi?

PSÁLMUR 57

Til hins hægsta Tónleikara, Ăl-tăs´-chîth, Mĭch´-tăm av Dávidi, tá ið hann flýddi frá Sauli í hellið.

VER miskunnarfullur at mær, O Guð, ver miskunnarfullur at mær: tí at mín sál lítur á teg: ja, í skugga veingja tína vil eg gera mítt skjól, inntil *hesir* skaðatilburðir verði gingnir yvir.

2 Eg vil geyla á Guð mest høgan; á Guð sum innir *øll ting* fyri meg.

3 Hann skal senda frá himni, og frelsa meg *frá* lastingini av honum sum vildi svølgt meg upp. Sĕ´-lâh. Guð skal senda fram sína miskunn og sannleika sín.

4 Mín sál *er* millum leyvur: *og* eg liggi *enntá millum* teirra sum eldur er settur á, *enntá* mannasynirnar, hvørs tenn *eru* spjótˇ og ørvar, og teirra tunga eitt hvast svørð.

5 Vert tú upphevjaður, O Guð, uppum himnarnar; *veri* tín dýrd uppiyvir allari jørðini.

6 Teir hava fyrireikað eitt garn til míni fet; mín sál er boygd niður: teir hava gravað eina holu frammanfyri mær, inn í miðjuna av hvørji teir eru falnir *sjálvir*. Sĕ´-lâh.

7 Mítt hjarta er fest, O Guð, mítt hjarta er fest: eg vil syngja og veita *lov*prís*an*.

8 Vakna, mín dýrd; vakna, psaltur og harpa: eg *sjálvur* vil vakna árla.

9 Eg vil prísa tær, O Harri, millum fólksins: eg vil syngja tær tjóðanna millum.

10 Tí at tín miskunn *er* mikil at himnunum, og tín sannleiki at skýggjunum.

11 Vert tú upphevjaður, O Guð, uppum himnarnar: *veri* tín dýrd uppiyvir allari jørðini.

PSÁLMUR 58

Til hins hægsta Tónleikara, Ăl-tăs´-chîth, Mĭch´-tăm av Dávidi.

TALA tit í roynd *og veru* rættvísi, O samkoma? døma tit rættliga, O tit mannasynir?

2 Ja, í hjarta tit virka vondsku; tit viga harðskapin av tykkara hondum á jørðini.

3 Hinir vondu eru fremmandgjørdir frá móðurlívinum: teir fara til stroks, so skjótt sum teir verði føddir, talandi lygnir.

4 Teirra eitur *er* eins og eitrið av einum høggormi: *teir eru* eins og hin deyvi eiturormurin, *sum* stappar sítt oyra;

5 Sum vil ikki geva gætur eftir røddini á gandakvøðarum, kvøðandi barasta so vísliga.

6 Brót teirra tenn, O Guð, í teirra munni: brót út hinar stóru tenn hjá teimum ungu leyvunum, O HARRI.

7 Lat teir smelta burtur sum vøtn, *sum* renna støðugt: *tá ið*

hann spennir *sín boga til at skjóta* sínar ørvar, lat teir verða sum skornar í stykkir.

8 Sum ein snigil *sum* smeltar, lat *hvønn og ēin av teimum* ganga undir: *líka sum* hin ófullbúna føðingin hjá eini kvinnu, *at* teir ei mega sjá sólina.

9 Áðrenn tykkara grýtur kunnu merkja tornirnar, skal hann taka teir burt sum við einum meldurvindi, bæði livandi, og í *síni* vreiði.

10 Hin rættvísi skal fegnast, tá ið hann sær hevndina: hann skal tváa sínar føtur í blóðinum av hinum vonda.

11 So at ein maður skal siga, Sanniliga, *tað finst* eitt endurgjald til hin rættvísa: sanniliga, hann er ein Guð sum dømir á jørðini.

PSÁLMUR 59

Til hins hægsta Tónleikara, Ăl-tăs´-chîth, Mĭch´-tām av Dávidi; tá ið Saul sendi, og teir vaktaðu húsið til at drepa hann.

ÚTFRÍA meg frá mínum figgindum, O Guð mín: verj meg frá teimum sum rísa upp ímóti mær.

2 Útfría meg frá misgerðarvirkarunum, og bjarga mær frá blóðigum monnum.

3 Tí at sí, teir liggja á lúri eftir míni sál: hinir mektigu eru savnaðir ímóti mær; ikki *fyri* misbrot mítt, ella *fyri* synd mína, O HARRI.

4 Teir renna og fyrireika seg uttan *mín* feil: vakna til at hjálpa mær, og síggj.

5 Tú tessvegna, O HARRI Guð herliðanna, Guð Ísraels, vakna til at heimsøkja allar hinar heidnu: ver ikki miskunnarfullur móti nøkrum vondum misbrótarum. Sē´-lâh.

6 Teir venda aftur um aftan: teir gera eitt ljóð sum ein hundur, og fara rundan um staðin.

7 Sí, teir froysa út við sínum munni: svørð *eru* í teirra vørrum: tí at hvør, *siga teir,* hoyrir?

8 Men tú, O HARRI, skalt flenna eftir teimum; tú skalt halda allar hinar heidnu fyri gjøldur.

9 *Uppá grund av* hansara styrki vil eg bíða eftir tær: tí at Guð *er* mín verja.

10 Guð miskunnar mínar skal koma mær á møti: Guð skal lata meg sjá *mína trá* uppá mínar fíggindar.

11 Bana teimum ikki, at ikki fólk mítt gloymi: spjað teir við tínum mátti; og før teir niður, O Harri vár skjøldur.

12 *Fyri* syndina av teirra munni *og* orðini av teirra varrum lat teir enntá verða tiknar í síni hugmóð: og fyri banning og lúgving, *sum* teir tala.

13 Upptær *teir* í vreiði, upptær *teir*, at teir ei *mega vera:* og lat teir vita, at Guð ræður í Jákobi at endum jarðarinnar. Sē´-lâh.

14 Og um aftan lat teir venda aftur; *og* lat teir gera eitt ljóð sum ein hundur, og fara rundan um staðin.

15 Lat teir reika niðan og oman vegna mat, og knarra, um teir ei verði mettaðir.

16 Men eg vil syngja um mátt tín; ja, eg vil syngja hart um tína miskunn um morgunin: tí at tú hevurt verið mín verja og skjøldur í deginum av míni trongd.

17 Tær, O mín styrki, vil eg syngja: tí at Guð *er* mín verja, *og* Guð miskunnar mínar.

PSÁLMUR 60

Til hins hægsta Tónleikara uppá Sjŭ´-shăn-ĕ´-dûth, Mĭch´-tām av Dávidi, til at frálæra; tá ið hann stríddi við Ár´-ăm-ná-hă-rá´-ĭm og við Ár´-ăm-zŏ´-băh, tá ið Jó´-ăb vendi aftur, og sló av Ē´-dóm í saltsdalinum tólv túsund.

O GUÐ, tú hevurt kastað okkum av, tú hevurt spjatt okkum, tú hevurt verið misnøgdur; O vend tær til okkum aftur.

2 Tú hevurt fingið jørðina at

nøtra; tú hevurt brotið hana: grøð hennara brestir; tí hon ristir.
3 Tú hevurt sýnt tínum fólki torfør ting: tú hevurt fingið okkum at drekka øtanar-vínið.
4 Tú hevurt givið eitt hermerki til teirra sum óttast teg, at tað má verða framvíst sannleikans vegna. Sē´-lâh.
5 At tínir háttelskaðu mega verða útfríaðir; bjarga *við* tíni høgru hond, og hoyr meg.
6 Guð hevur talað í sínum heilagleika; eg vil fegnast, eg vil skifta Sjē´-chĕm *sundur,* og máta upp Sŭc´-cōth-s dal.
7 Gilead *er* mítt, og Mă-năs´-sēh *er* mítt; Ē´-phră-ĭm eisini *er* styrki høvurs míns; Judah *er* mín lóggevari;
8 Móab *er* tváttarskál mín; yvir Ē´-dóm vil eg kasta út skógv mín: Philistia, stórsigra tú uppá grund av mær.
9 Hvør vil føra meg *inn í* hin sterka stað? hvør vil leiða meg inn í Ē´-dóm?
10 *Vilt* ikki tú, O Guð, *sum* hevurt kastað okkum av? og *tú,* O Guð, *sum* fórt ikki út við herum várum?
11 Veit okkum hjálp frá trongd: tí at fáfongd *er* hjálpin hjá manni.
12 Gjøgnum Guð, vit skulum inna reystliga: tí at hann *tað er, sum* skal traðka niður okkara fíggindar.

PSÁLMUR 61

Til hins hægsta Tónleikara uppá Nē´-gī-nâh, *Ein Psálmur* av Dávidi.

HOYR mítt róp, O Guð; gáa at míni bøn.
2 Frá jarðarinnar enda vil eg rópa á teg, tá ið mítt hjarta er yvirfloymt: leið meg til klettin, *sum* er hægri enn eg.
3 Tí at tú hevurt verið eitt skýli hjá mær, *og* eitt sterkt torn frá fíggindanum.
4 Eg vil dvølja í tínum tabernakli um ævir: eg vil líta á lívdina av tínum veingjum. Sē´-lâh.
5 Tí at tú, O Guð, hevurt hoyrt míni heitstreingir: tú hevurt givið *mær* arvalutin hjá teimum sum óttast títt navn.
6 Tú vilt framleingja kongsins lív: *og* árini hjá honum sum mong ættarlið.
7 Hann skal verða frammi fyri Guði um ævir: O fyribúgv miskunn og sannleika, *sum* mega varðveita hann.
8 So vil eg syngja tínum navni prís um ævir, at eg má dagliga útinna míni heitstreingir.

PSÁLMUR 62

Til hins hægsta Tónleikara, til Jē´-dū-thûn, Ein Psálmur av Dávidi.

SANNILIGA, sál mín bíðar eftir Guði: frá honum *kemur* mín frelsa.
2 Hann einans *er* klettur mín og frelsa mín; *hann er* mín verja; eg skal ikki verða stórliga vikaður.
3 Hvør leingi vilja tit ímynda grand ímóti einum manni? tit skulu verða vignir allir av tykkum: sum ein bognandi múrur *skulu tit verða, og sum* ein skinklandi girðing.
4 Teir einans ráðførast *um* at kasta *hann* niður frá hans avbærni: teir fragdast í lygnum: teir vælsigna við sínum munni, men teir banna innvortisligani. Sē´-lâh.
5 Sál mín, bíða tú einans eftir Guði; tí at mín eftirvæntan *er* frá honum.
6 Hann einans *er* klettur mín og frelsa mín: *hann er* mín verja; eg skal ikki verða vikaður.
7 Í Guði *er* frelsa mín og dýrd mín: klettur styrki mínar, *og* skjól mítt, *er* í Guði.
8 Lítið á hann til allar tíðir; tit fólk, hellið út tykkara hjarta frammi fyri honum: Guð *er* eitt skjól hjá okkum. Sē´-lâh.

9 Vissuliga, menn av lágum stigi *eru* fáfongd, *og* menn av høgum stigi *eru* ein lygn: at verða lagdir á vágskálina *eru* teir aldeilis *lættari* enn fáfongd.

10 Lítið ikki á kúgan, og gerist ikki fáfongdir í ráni: um ríkidømir økist, setið ei tykkara hjarta *uppá tey*.

11 Guð hevur talað ēina ferð; tvær ferðir havi eg hoyrt hetta; at máttur *tilhoyrir* Guði.

12 Eisini innat tær, O Harri, *tilhoyrir* miskunn: tí at tú veitirt til hvørs mans samsvarandi við verk hans.

PSÁLMUR 63

Ein Psálmur av Dávidi, tá ið hann var í Judah oyðu.

O GUÐ, tú *ert* Guð mín; árla vil eg søkja teg: míni sál tyrstir eftir tær, mínum kjøti leingist eftir tær í einum turrum og tyrstum landi, har einkið vatn er;

2 At skoða tín mátt og tína dýrd, so *sum* eg havi sæð teg í halgidóminum.

3 Av tí at tín elskandi blídni *er* betri enn lív, skulu varrar mínar prísa tær.

4 Soleiðis vil eg vælsigna teg, meðan eg livi: eg vil lyfta upp mínar hendur í navni tínum.

5 Mín sál skal verða mettað sum *við* mergi og fiti; og mín muður skal prísa *tær* við frødligum vørrum:

6 Tá ið eg minnist teg uppiá míni song, *og* grundi yvir teg í *náttar*vøkunum.

7 Av tí at tú hevurt verið mín hjálp, tí vil eg fegnast í skugga veingja tína.

8 Mín sál fylgir strítt eftir tær: tín høgra hond heldur mær uppi.

9 Men teir *sum* søkja mína sál, til at oyða *hana,* skulu fara inn í hinar lægru partar jarðarinnar.

10 Teir skulu falla við ˆ svørðinum: teir skulu verða ein skamtur til revar.

11 Men kongurin skal fegnast í Guði; hvør tann, sum svør við hann, skal dýrda *sær:* men munnurin hjá teimum, sum tala lygnir, skal verða teptur.

PSÁLMUR 64

Til hins hægsta Tónleikara, Ein Psálmur av Dávidi.

HOYR mína rødd, O Guð, í míni bøn: varðveit mítt lív frá ótta fyri figgindanum.

2 Fjal meg frá hinum loynda ráði hjá teimum vondu; frá uppreistrinum hjá misgerðar-virkarunum:

3 Sum hvessa sína tungu sum eitt svørð, *og* spenna *sínar bogar at skjóta* sínar ørvar, *enntá* beisk orð:

4 At teir mega skjóta í loynd eftir hinum fullkomna: brádliga skjóta teir eftir honum, og óttast ikki.

5 Teir tilstuðla sær sjálvum *í* eini óndari søk: teir samtala um at leggja snerrur loyniligani; teir siga, Hvør skal síggja tær?

6 Teir grunda út misgerðir; teir fullføra eina dúgliga kanning: bæði hin innvortis *hugsanin* hjá hvørjum *og* ēinum *av teimum,* og hjartað, *er* djúpt.

7 Men Guð skal skjóta eftir teimum *við* eini ørv; brádligani skulu teir verða særdir.

8 So teir skulu fáa sína egnu tungu at falla omanyvir seg sjálvar: allir, sum síggja teir, skulu flýggja avstað.

9 Og allir menn skulu óttast, og skulu kunngera Guðs verk; tí at teir skulu vísliga umhugsa um hansara gerning.

10 Hin rættvísi skal verða glaður í HARRANUM, og skal líta á hann; og allir hinir reiðiligu í hjarta skulu dýrda.

PSÁLMUR 65

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur *og* Songur av Dávidi.

LOV bíðar eftir tær, O Guð, á Sí-ón: og innat tær skal heitstreingið verða útint.

2 O tú sum hoyrirt bøn, innat tær skal alt kjøt koma.

3 Misgerðir hava yvirváð ímóti mær: *hvat* okkara misbrotum *viðvíkur,* tú skalt reinska tey burtur.

4 Vælsignaður *er tann maður sum* tú velurt, og veldurt at nærkast *at tær,* at hann má dvøljast í forgørðum tínum: vit skulu verða mettaðir við góðskuni av tínum húsi, *enntá* av tínum heilaga templi.

5 *Við* ræðuligum tingum í rættvísi vilt tú svara okkum, O Guð frelsu várar; *sum ert* álitið hjá øllum endum jarðarinnar, og hjá teimum sum eru langt burturifrá *uppiá* sjónum:

6 Sum við síni styrki grundfestir fjøllini; *verandi* gyrdur við megi:

7 Sum stillir ljóðið av sjógvunum, ljóðið av teirra bárum, og hávan av fólkinum.

8 Teir eisini, sum búgva í teimum ytstu pørtunum, eru ræddir við tíni tekin: tú fært útgongdirnar hjá morgninum og kvøldi*num* at fegnast.

9 Tú vitjart jørðina, og vatnart hana: tú stórligani uppríkart hana við Guðs á, *sum* er full av vatni: tú fyribýrt teimum korn, tá ið tú soleiðis hevurt skaffað fyri tí.

10 Tú vatnart hennara ryggir ríkiligani: tú seturt hennara foyrur: tú gert hana bleyta við skúrum: tú vælsignart hennara spretting.

11 Tú krýnirt árið við tíni góðsku; og tínar rásir drúpa *við* fiti.

12 Tær drúpa *uppá* oyðunnar beitir: og hinir lítlu heyggjarnir fegnast á hvørjari síðu.

13 Beitini eru kløddi við fylgjum; dalarnir eisini eru dekkaðir yvir við korni; tey rópa av gleði, tey eisini syngja.

PSÁLMUR 66

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Songur *ella* Psálmur.

GERIÐ Guði eitt frødligt ljóð, øll tit lond:

2 Syngið fram heiðurin hjá hansara navni: gerið hansara lov dýrdsamt.

3 Sigið við Guð, Hvør ræðuligur *tú ert í* tínum verkum! igjøgnum mikilleikan av tíni kraft skulu tínir figgindar undirgeva seg tær.

4 Øll jørðin skal tilbiðja teg, og skal syngja at tær; teir skulu syngja *til* navn títt. Sē-lâh.

5 Komið og síggið Guðs verk: *hann er* ræðuligur *í sínum* gerningi mótvegis mannabørnunum.

6 Hann skifti sjógvin yvirí turt *land:* teir fóru ígjøgnum flóðina til fóts: har fegnaðust vit í honum.

7 Hann stjórnar við síni makt um ævir; hans eygu skoða tjóðirnar: lat ikki hinar uppreistrarsomu upphevja seg. Sē-lâh.

8 O vælsignið Guð okkara, tit fólk, og fáið røddina av hansara lovi at verða hoyrda:

9 Sum heldur okkara sál í lívi, og loyvir ei okkara fótum at verða vikaðum.

10 Tí at tú, O Guð, hevurt prøvað okkum: tú hevurt roynt okkum, sum silvur verður roynt.

11 Tú førdirt okkum inn í garnið; tú legðirt kvøljan uppá okkara lendar.

12 Tú hevurt volt monnum at ríða yvir okkara høvdum; vit fóru ígjøgnum eld og ígjøgnum vatn: men tú førdirt okkum út í eitt ríkt *pláss*.

13 Eg vil fara inn í títt hús við brenniofrum: eg vil rinda tær heitstreingir míni,
14 Sum mínar varrar hava mælt, og mín muður hevur talað, tá ið eg var í trongd.
15 Eg vil ofra tær gøðinga-brenni-sláturoffur˘, við roykilsi veðra; eg vil ofra ungtarvar við geitum. Sē´-lâh.
16 Komið *og* hoyrið, allir tit sum óttast Guð, og eg vil kunngera hvat hann hevur gjørt fyri mína sál.
17 Eg rópaði á hann við mínum munni, og hann varð hálovaður við míni tungu.
18 Um eg gevi gætur eftir misgerð í mínum hjarta, vil Harrin ikki hoyra *meg:*
19 *Men* sanniliga, Guð hevur hoyrt *meg;* hann hevur gáað eftir røddini á míni bøn.
20 Vælsignaður *veri* Guð, sum hevur ikki vent burtur míni bøn, ella síni miskunn frá mær.

PSÁLMUR 67

Til hins hægsta Tónleikara á Nē´-gī-nōth,
Ein Psálmur *ella* songur.

GUÐ veri miskunnarfullur at okkum, og vælsigni okkum; *og* voldi sínum andliti at skína uppá okkum; Sē´-lâh.
2 At tín vegur má verða kendur uppiá jørð, tín frelsandi heilsa alra tjóða millum.
3 Lat fólkið prísa tær, O Guð; lat alt fólkið prísa tær.
4 O lat tjóðirnar vera glaðar og syngja av frøi: tí at tú skalt døma fólkið rættvísiliga, og stjórna tjóðunum uppiá jørð. Sē´-lâh.
5 Lat fólkið prísa tær, O Guð; lat alt fólkið prísa tær.
6 *Tá* skal jørðin lata sína grøði; *og* Guð, *enntá* vár egni Guð, skal vælsigna okkum.
7 Guð skal vælsigna okkum; og allir endar jarðarinnar skulu óttast hann.

PSÁLMUR 68

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur *ella* Songur av Dávidi.

LAT Guð reisast, lat hansara fíggindar verða spjaddar: lat teir eisini, sum hata hann, flýggja frammi fyri honum.
2 Eins og roykur verður rikin burtur, *soleiðis* rek *teir* burtur: eins og voks smeltar frammanfyri eldinum, *soleiðis* lat hinar vondu týnast fyri nærveru Guðs.
3 Men lat hinar rættvísu vera glaðar; lat teir fegnast frammi fyri Guði: ja, lat teir ovurhondsliga fegnast.
4 Syngið at Guði, syngið *lovprís**ing**ar* til hansara navn: hálovið hann sum ríður uppiá himnunum við sínum navni JAH, og fegnist frammi fyri honum.
5 Ein faðir hjá teimum faðirleysu, og ein dómari hjá einkjunum, *er* Guð í sínum heilaga bústaði.
6 Guð setur hinar ēinligu í familjur: hann førir út teir, sum eru bundnir, við ketum: men hinir uppreistrarsomu dvøljast í einum turrum *landi*.
7 O Guð, tá ið tú fórt út frammanfyri fólki tínum, tá ið tú hergekst gjøgnum oyðuna; Sē´-lâh:
8 Jørðin risti, himnarnir eisini dryppaðu fyri Guðs nærveru: *enntá* Sĭ´-nâi sjálvt *varð vikað* fyri nærveru Guðs, Ísraels Guðs.
9 Tú, O Guð, sendirt eitt ríkiligt regn, hvarvið^ tú festirt um arv tín, tá ið hann var lúgvaður.
10 Tín samkoma hevur búð harí: tú, O Guð, hevurt fyribúgvið av tíni góðsku til hin fátæka.
11 Harrin gav orðið: mikil *var* flokkurin av teimum sum kunngjørdu *tað*.
12 Kongar hjá herum flýggjaðu skjótt: og hon, sum varð við hús, býtti herfongin.

13 Tó *at* tit havi ligið pottanna millum, *tó skulu tit vera sum* veingirnir hjá eini dúgvu, dekkaðir við silvuri, og hennara fjaðrar við gulum gulli.

14 Tá ið hin Almáttugi spjaddi kongar í tí, var tað *hvítt* sum snjó í Săl′-mŏn.

15 Guðs hólur *er sum* Bá′-sjăn-s hólur; ein høgur hólur *sum* Bá′-sjăn-s hólur.

16 Hví leypa tit, tit høgu hólar? *hesin er* hólurin, *sum* Guð tráar at dvøljast í; ja, HARRIN vil dvøljast *í honum* um ævir.

17 Guðs hervagnar *eru* tjúgu túsund, *enntá* túsundir av einglum: Harrin *er* teirra millum, *sum á* Sĭ′-nāĭ, í tí heilaga *plássinum*.

18 Tú hevurt uppstigið til hæddar, tú hevurt leitt fangaskap til fanga: tú hevurt tikið við gávum til manna; ja, *til* hinna uppreistrarsomu eisini, at HARRIN Guð mátti búgva *teirra millum*.

19 Vælsignaður *veri* Harrin, *sum* dagliga løðir okkum *við vælgerðum, enntá* Guð frelsu várar. Sē′-lâh.

20 *Hann, sum er* Guð vár, *er* frelsunnar Guð; og innat GUÐI Harranum *tilhoyra* útrenningarnar frá deyða.

21 Men Guð skal særa høvdið á sínum figgindum; *og* hin lodna hvirilin á einum slíkum sum gongur áfram enn í sínum misbrotum.

22 Harrin segði, Eg vil føra aftur frá Bá′-sjăn, eg vil føra *mítt fólk* aftur frá havsins dýpdum:

23 At tín fótur má verða dyppaður í blóðið hjá *tínum* figgindum, *og* tungan hjá tínum hundum í tað sama.

24 Teir hava sæð tínar gongur, O Guð; *enntá* gongur Guðs míns, Kongs míns, í halgidóminum.

25 Sangararnir fóru undan, spælararnir á ljóðførir *fylgdu* eftir; *teirra* millum *vóru* genturnar, spælandi við tamburīnum.

26 Vælsignið tit Guð í samkomunum, *enntá* Harran, frá Ísraels keldu.

27 Har *er* lítli Benjamin *við* teirra stjórnara, prinsarnir av Judah *og* teirra ráð, prinsarnir av Zē′-bū-lŏn, *og* prinsarnir av Năph′-tâ-lī.

28 Tín Guð hevur boðið tína styrki: styrk, O Guð, tað sum tú hevurt virkað fyri okkum.

29 Uppá grund av tínum templi í Jerusalem skulu kongar koma við gávum at tær.

30 Harta spjótmannanna flokk, tarvanna fjøld, við kálvum fólksins, *til hvør og ēin* undirgevi seg við stykkjum av silvuri: spjað tú fólkið *sum* fragdast í kríggi.

31 Prinsar skulu koma út úr Egyptalandi; Ē-thĭ-ō′-pĭ-a skal brátt rætta út sínar hendur at Guði.

32 Syngið Guði, tit kongadømir jarðarinnar; O syngið Harranum *lov*prísingar; Sē′-lâh:

33 Til hansara sum ríður uppiá himnum himna, *sum vóru* úr fordum; sí, hann sendir út sína rødd, *og tað* eina mektiga rødd.

34 Tilskrivið tit Guði styrki: hans avbærni *er* yvir Ísrael, og hansara styrki *er* í skýggjunum.

35 O Guð, *tú ert* ræðuligur úr tínum heilagu plássum: Ísraels Guð *er* hann sum gevur *sínum* fólki styrki og kraft. Vælsignaður *veri* Guð.

PSÁLMUR 69

Til hins hægsta Tónleikara uppá Sjô-sjănn′-īm, *Ein Psálmur* av Dávidi.

FRELS meg, O Guð; tí at vøtnini eru komin inn at *míni* sál.

2 Eg søkki í djúpari mýru, har *tað er* einkið at standa *á:* eg eri komin í djúp vøtn, har flóðirnar floyma yvir meg.

3 Eg eri móður av mínum gráti: mín hálsur er tornaður: míni eygu bila, meðan eg bíði eftir Guði mínum.

4 Teir, sum hata meg uttan grund, eru fleiri enn hár høvurs míns: teir, sum vildu oytt meg, *verandi* mínir figgindar av órøttum, eru mektigir: tá endurbøtti eg *tað* sum eg tók ikki burtur.

5 O Guð, tú kennirt mín dárskap; og mínar syndir eru ikki fjaldar fyri tær.

6 Lat ikki teir, sum bíða eftir tær, O Harri GUÐ herliðanna, verða til skammar fyri mína skyld: lat ikki teir, sum søkja teg, verða fjamskaðar fyri mína skyld, O Guð Ísraels.

7 Av tí at fyri tína skuld havi eg borið spott; skomm hevur dekkað mítt andlit.

8 Eg eri vorðin ein fremmandur yvirfyri brøðrum mínum, og ein ókunnumaður yvirfyri børnum móður mínar.

9 Tí at vandlæti húss tíns hevur etið meg upp; og háðanirnar av teimum, sum háðaðu teg, eru falnar uppá meg.

10 Tá ið eg grætt, *og agaði* mína sál við føstu, varð tað til skemd mína.

11 Eg gjørdi sekkjaklæði eisini *til* mítt klæði; og eg gjørdist eitt orðtak fyri teimum.

12 Teir, sum sita í portrinum, tala ímóti mær; og eg *var* sangurin hjá drykkjumonnunum.

13 Men hvat viðvíkur mær, mín bøn *er* til tín, O HARRI, *í* eini góðtokkaligari tíð: O Guð, í fjøldini av tíni miskunn hoyr meg, í sannleika frelsu tínar.

14 Bjarga mær burtur úr mýruni, og lat meg ikki søkka: lat meg verða útfríaðan frá teimum sum hata meg, og burtur úr teimum djúpu vøtnunum.

15 Lat ikki vatnflóðina fløða yvir meg, eiheldur lat djúpið svølgja meg upp, og lat ikki holuna loka sín munn omanyvir meg.

16 Hoyr meg, O HARRI; tí at tín elskandi blíðni *er* góð: vend at mær samsvarandi við fjøldina av tínum eymu miskunnum.

17 Og fjal ikki títt andlit fyri tænara tínum; tí at eg eri í trongd: hoyr meg skundisliga.

18 Dregst nær at míni sál, *og* endurloys hana: bjarga mær uppá grund av mínum figgindum.

19 Tú hevurt kent háð mítt, og skomm mína, og mína vanæru: mínir mótstandarar *eru* allir frammi fyri tær.

20 Háð hevur brotið mítt hjarta; og eg eri fullur av tyngd: og eg leitaði *eftir onkrum* at hava várkunn, men *har var* eingin; og eftir uggarum, men eg fann ongan.

21 Teir góvu mær eisini gall til mat mín; og í mínum torsta teir góvu mær edik at drekka.

22 Lat teirra borð gerast ein snerra frammi fyri teimum: og *tað, sum skuldi havt verið* til *teirra* vælferð, *lat tað gerast* ein fella.

23 Lat teirra eygu verða myrkjað, at teir síggi ei; og fá teirra lendar støðugt at riða.

24 Hell út tína harmavreiði uppá teir, og lat tína vreiðifullu firtni taka hald á teimum.

25 Lat teirra býli vera oyði; *og* lat ongan búgva í teirra tjøldum.

26 Tí at teir søkja at *honum* sum tú hevurt sligið; og teir tala til harm teirra sum tú hevurt sært.

27 Legg misgerð afturat teirra misgerð: og lat teir ikki koma inn í rættvísi tína.

28 Lat teir verða slettaðar út úr bók teirra livandi, og ei verða skrivaðar við teimum rættvísu.

29 Men eg *eri* armur og sorgarfullur: lat tína frelsu, O Guð, seta meg upp til hæddar.

30 Eg vil prísa Guðs navni við einum sangi, og vil gera hann stóran við takkarveitan.

31 *Hetta* eisini skal tokna HARRANUM betur enn ein oksi *ella* ungtarvur, sum hevur hornˇ og hógvar.

32 Hinir eyðmjúku skulu sjá *hetta, og* verða glaðir: og tykkara hjarta skal liva sum søkja Guð.
33 Tí at HARRIN hoyrir hinar ørmu, og vanvirðir ei sínar fangar.
34 Lat himinin og jørð*ina* prísa honum, sjógvarnar, og hvørt ting ið rørist harí.
35 Tí at Guð vil frelsa Zion, og vil byggja staðirnar av Judah: at teir mega búgva har, og hava tað í ogn.
36 Sáðið eisini hjá hansara tænarum skal arva tað: og teir, sum elska hans navn, skulu búgva harí.

PSÁLMUR 70

Til hins hægsta Tónleikara, *Ein Psálmur* av Dávidi, at føra til endurminningar.

SKUNDA tær, O Guð, at útfría meg; ger skjótt *av* at hjálpa mær, O HARRI.
2 Lat teir verða skamm*full*ar og fjamskaðar sum søkja eftir míni sál: lat teir verða vendar aftureftir, og settar til ørkymlanar, sum tráa mín skaða.
3 Lat teir verða vendar tilbakar til eitt endurgjald av síni skomm, sum siga, Há, há.
4 Lat allar teir, sum søkja teg, fegnast og vera glaðar í tær: og lat slíkar, sum elska tína frelsu, støðugt siga, Lat Guð verða stórgjørdan.
5 Men eg *eri* armur og tørvandi: skunda tær at mær, O Guð: tú *ert* mín hjálp og mín útfríari; O HARRI, inn onga drálan.

PSÁLMUR 71

ÁTEG, O HARRI, eg seti mítt álit: lat meg aldri verða settan til ørkymlanar.
2 Útfría meg í tíni rættvísi, og vold mær at komast undan: bend oyra títt at mær, og frels meg.
3 Vert tú mín sterki bústaður, at hvørjum eg støðugt má leita: tú hevurt givið ábjóðing *um* at frelsa meg; tí at tú *ert* mín klettur og mín festningur.
4 Útfría meg, O Guð mín, út úr hondini á hinum vonda, út úr hondini á tí órættvísa og grimma manninum.
5 Tí at tú *ert* mín vón, O Harri GUÐ: *tú ert* mítt álit frá ungdómi mínum.
6 Av tær havi eg verðið hildin uppi frá móðurlívinum: tú ert hann sum tók meg út úr innangoymslum móður mínar: mín *lov*prísan *skal vera* áframhaldandi av tær.
7 Eg eri sum eitt undur yvirfyri mongum; men tú *ert* mítt sterka skjól.
8 Lat mín munn verða fyltan *við* tíni *lov*prísan *og við* tíni æru allan dagin.
9 Kasta meg ikki av í tíðini av gomlum aldri; yvirgev meg ikki, tá ið mín styrki svitast.
10 Tí at mínir figgindar tala ímóti mær; og teir, sum liggja *á* lúri eftir míni sál, halda ráðlegging saman,
11 Sigandi, Guð hevur yvirgivið hann: søkið at og takið hann; tí at *tað er* eingin at bjarga *honum*.
12 O Guð, ver ikki fjart frá mær: O Guð mín, ger skjótt *av* til hjálp mína.
13 Lat teir verða fjamskaðar *og* upptærdar, sum eru mótstandarar fyri míni sál; lat teir verða dekkaðar *við* skemd og vanæru, sum søkja mín skaða.
14 Men eg vil áframhaldandi vóna, og vil enn prísa tær meira og meira.
15 Mín muður skal sýna fram tína rættvísi *og* tína frelsu allan dagin; tí eg veit ikki tølini *hará*.
16 Eg vil fara í styrki Harrans GUÐS: eg vil nevna tína rættvísi, *enntá* tína einans.
17 O Guð, tú hevurt lært meg frá ungdómi mínum: og higartil havi eg kunngjørt tíni undurfullu verk.

18 Nú eisini, tá ið eg eri gamal og gráhærdur, O Guð, yvirgev meg ikki; inntil eg havi sýnt *hesi* ætt tína styrki, *og* tína kraft fyri hvørjum tí *sum* koma skal.

19 Tín rættvísi eisini, O Guð, *er* sera høg, hvør gjørt hevurt mikil ting: O Guð, hvør *er* líkur tær!

20 *Tú,* sum hevurt sýnt mær miklar og svárar trongdir, skalt lívga meg aftur, og skalt føra meg upp aftur frá dýpdum jarðarinnar.

21 Tú skalt økja mín mikilleika, og meg ugga á hvørjari síðu.

22 Eg vil eisini prísa tær við psaltrinum, *enntá* sannleika tínum, O Guð mín: tær vil eg syngja við harpuni, O tú Hin Heilagi Ísraels.

23 Mínar varrar skulu stórliga fegnast, tá ið eg syngi at tær; og mín sál, sum tú hevurt endurloyst.

24 Mín tunga eisini skal tala um tína rættvísi allan dagin langan: tí at teir eru fjamskaðir, tí at teir eru førdir at skomm, sum søkja mín skaða.

PSÁLMUR 72

Ein Psálmur til Sálomons.

GEV konginum dómar tínar, O Guð, og tína rættvísi at kongssyninum.

2 Hann skal døma títt fólk við rættvísi, og tínar ørmu við dómi.

3 Fjøllini skulu føra frið til fólkið, og hinir lítlu heyggjar, við rættvísi.

4 Hann skal døma hinar ørmu fólksins, hann skal frelsa børn teirra tørvandi, og skal bróta í stykkir kúgaran.

5 Teir skulu óttast teg so leingi sum sólin og mánin vara, út gjøgnum allar ættir.

6 Hann skal koma niður sum regn uppá tað sligna grasið: eins og skúrir *sum* vatna jørðina.

7 Á hansara døgum skulu hinir rættvísu blómka; og ríkiligsemi av friði so leingi sum mánin varir.

8 Hann skal hava harradømi eisini frá sjógvi til sjóvar, og frá ánni at endum jarðarinnar.

9 Teir, sum dvøljast í oyðuni, skulu lúta frammi fyri honum; og hansara figgindar skulu sleikja støvið.

10 Kongarnir av Tarsjisj og av oyggjunum skulu koma við gávum: kongarnir av Sjē´-bă og Sē´-bă skulu ofra gávur.

11 Ja, allir kongar skulu falla niður frammi fyri honum: allar tjóðir skulu tæna honum.

12 Tí at hann skal bjarga tí tørvandi, tá ið hann rópar; hinum arma eisini; og *honum* sum ongan hjálpara hevur.

13 Hann skal spara hin fátæka og tørvandi, og skal frelsa sálirnar hjá teimum tørvandi.

14 Hann skal endurloysa teirra sál frá sviki og harðskapi: og dýrabært skal teirra blóð vera í hans eygsjón.

15 Og hann skal liva, og til hansara skal verða givið av gullinum úr Sjē´-bă: bøn eisini skal verða gjørd fyri honum støðugt; *og* dagliga skal hann verða prísaður.

16 Tað skal vera ein hondfull av korni á jørðini uppiá toppinum av fjøllunum; tess ávøkstur skal rista sum Lī´-bă-nŏn: og *teir* úr staðinum skulu blómka sum gras jarðarinnar.

17 Hansara navn skal vara um ævir: hansara navn skal verða hildið áfram so leingi sum sólin: og *menn* skulu vera vælsignaðir í honum: allar tjóðir skulu kalla hann signaðan.

18 Vælsignaður *veri* HARRIN Guð, Guð Ísraels, sum einans ger undurfull ting.

19 Og vælsignað *veri* hans dýrd-

sama navn um ævir: og lat alla jørðina verða fylta *við* hansara dýrd; Á·měn, og Á·měn.
20 Bønirnar hjá Dávidi Ísai·s syni eru endaðar.

PSÁLMUR 73

Ein Psálmur av Á·săph·i.

SANNILIGA, Guð *er* góður móti Ísrael, *enntá* móti slíkum sum eru av einum reinum hjarta.
2 Men hvat viðvíkur mær, mínir føtur vóru næstan farnir; míni fet høvdu heilt nær gliðið.
3 Tí eg var øvundsjúkur inná hinar dársomu, *tá ið* eg sá framgongdina hjá hinum vondu.
4 Tí at *tað eru* eingi bond í teirra deyða: men teirra styrki *er* føst.
5 Teir *eru* ikki í trongd *sum aðrir* menn; eiheldur verða teir plágaðir líkasum *aðrir* menn.
6 Stoltleiki tessvegna umringar teir umkring sum ein keta; harðskapur dekkar teir *sum* eitt klæði.
7 Teirra eygu standa út við fiti: teir hava meir enn hjarta kundi ynskt.
8 Teir eru spiltir, og tala vondligani *viðvíkjandi* kúgan: teir tala loftigani.
9 Teir seta sín munn ímóti himnunum, og teirra tunga gongur gjøgn jørðina.
10 Hansara fólk tí venda aftur higar: og vøtn av einum fullum *bikari* verða vundin út til teirra.
11 Og teir siga, Hvussu veit Guð? og er kunnleiki í tí mest Høga?
12 Sí, hetta *eru* hinir ógudiligu, sum framganga í heiminum; teir økjast *í* ríkidømum.
13 Sanniliga, eg havi reinsað mítt hjarta *til* einkiðs, og tvigið mínar hendur í sakloysi.
14 Tí at allan dagin langan havi eg verðið plágaður, og agaður hvønn morgun.
15 Um eg sigi, Svá vil eg tala; sí, eg hevði *volt* meinboga *ímóti* ætt barna tína.
16 Tá ið eg hugsaði at kenna hetta, *var* tað ov pínufult hjá mær;
17 Inntil eg fór inn í Guðs halgidóm; *tá* skilti eg teirra enda*lykt*.
18 Tú vissuliga settirt teir á hál pláss: tú kastaðirt teir niður inn í oyðing.
19 Hvør eru teir *førdir* inn í oyðing, sum í einum eygnabragdi! teir eru fullkomiliga upptærdir við ræðslum.
20 Eins og ein dreymur tá ið *ēin* vaknar; *soleiðis*, Ó Harri, tá ið tú vaknart, skalt tú vanvirða teirra mynd.
21 Svá varð hjarta mítt harmað, og eg varð prikaður í mínum nýrum.
22 So dársamur *var* eg, og fáfróður: eg var *eins og* eitt djór frammi fyri tær.
23 Hóast hetta, eg *eri* støðugt hjá tær: tú hevurt hildið *mær* við mína høgru hond.
24 Tú skalt leiða meg við tínum ráði, og síðan móttaka meg *til* dýrdar.
25 Hvønn havi eg í himni *uttan teg?* og *tað er* eingin uppiá jørð, *sum* eg trái umframt teg.
26 Mítt kjøt og mítt hjarta bilar: *men* Guð *er* styrki hjarta míns, og mín skamtur um ævir.
27 Tí at sí, teir, sum eru fjart frá tær, skulu týnast: tú hevurt oytt allar teir sum fara horandi frá tær.
28 Men *tað er* gott hjá mær at draga nær til Guðs: eg havi sett mítt álit á Harran GUÐ, at eg má kunngera øll tíni verk.

PSÁLMUR 74

Măs'·chĭl av Á·săph·i.

O GUÐ, hví hevurt tú kastað *okkum* av um ævir? *hví* rýkur tín øði ímóti seyðinum av tínum beiti?

2 Minst til tína samkomu, *sum* tú hevurt keypt frá gomlum *av;* stavin av arvi tínum, *sum* tú hevurt endurloyst; hetta Zion fjall, í hvørjum tú hevurt búð.

3 Lyft upp tínar føtur at hinum viðvarandi oyðingum; *enntá* øllum *sum* fíggindin hevur vondligani gjørt í halgidóminum.

4 Tínir fíggindar ýla í miðjum samkomum tínum; teir seta upp síni hermerkir *sum* merkir.

5 *Ein maður* var navngitin samsvarandi sum hann hevði lyft upp øksir uppá hini tjúkku trø.

6 Men nú bróta teir niður hitt telgda arbeiði tess alt fyri eitt við øksum og hamarum.

7 Teir hava kastað eld inn í halgidóm tín, teir hava dálkað *við at kasta niður* bústað navns tíns til jarðarinnar.

8 Teir søgdu í hjørtum sínum, Latum oss oyða teir tilsaman: teir hava brent upp allar sýnagogurnar hjá Guði í landinum.

9 Vit síggja ikki okkara tekinˇ: *tað er* ikki longur nakar prophetur: eiheldur *er tað* okkara millum nakar sum veit hvussu leingi.

10 O Guð, hvussu leingi skal mótstandarin spotta? skal fíggindin Guðsspotta títt navn um ævir?

11 Hví dregurt tú undan tína hond, enntá tína høgru hond? slít *hana* út úr barmi tínum.

12 Tí at Guð *er* mín Kongur frá gomlum *av,* virkandi frelsu á miðjari jørðini.

13 Tú atskildirt sjógvin viðˆ tíni styrki: tú breytst høvdini hjá drekunum í vøtnunum.

14 Tú breytst høvdini hjá lĕ´-vĭă-thăn í stykkir, *og* gavst hann *at vera* matur til fólkið — búgvandi í oyðuni.

15 Tú kleyvst kelduna og flóðina: tú turkaðirt upp mektigar áir.

16 Dagurin *er* tín, náttin eisini *er* tín: tú hevurt fyrireikað ljósið og sólina.

17 Tú hevurt sett øll mørkini hjá jørðini: tú hevurt gjørt summar og vetur.

18 Minst til hetta, *at* fíggindin hevur háðað, O HARRI, og *at* hitt dársama fólk hevur Guðsspottað títt navn.

19 O flýggja ikki sálina hjá tíni turtildúgvu at fjøldini *av teimum vondu:* gloym ikki samkomuna av tínum ørmu um ævir.

20 Hav fyrilit yvirfyri sáttmálanum: tí at jarðarinnar myrku pláss eru full av grimmseminnar bústøðum.

21 O lat ei hinar kúgaðu venda aftur skamm*full*ar: lat hinar ørmu og tørvandi prísa navni tínum.

22 Reis *teg,* O Guð, før tína egnu søk: minst til, hvussu hin dársami maðurin háðar teg dagliga.

23 Gloym ikki røddina á tínum fíggindum: hávin av teimum, sum rísa upp ímóti tær, støðugt økist.

PSÁLMUR 75

Til hins hægsta Tónleikara, Ăl-tăs´-chĭth, Ein Psálmur *ella* Songur av Á´-săph-i.

TÆR, O Guð, veita vit tøkkir, *tær* veita vit tøkkir: tí at *tað, at* títt navn er nær, tíni undursomu verk kunngera.

2 Tá ið eg skal taka við samkomuni, vil eg døma rættligani.

3 Jørðin og allir hennara íbúgvar eru uppløystir: eg haldi uppi hennara súlum. Sĕ´-lâh.

4 Eg segði við dárarnar, Handlið ikki dársamligani: og til hinna vondu, Lyftið ikki upp hornið:

5 Lyftið ikki upp tykkara hornum til hæddar: talið *ikki við* einum hørðum svíra.

6 Tí at framflutningur *kemur* hvørki úr eystri, ella úr vestri, ella úr suðri.

7 Men Guð *er* dómarin: hann koyrir niður ēin, og setur upp ein annan.

8 Tí at í HARRANS hond, *har er* eitt bikar, og vínið er reytt; tað er fult av blandingi; og hann hellir út av hinum sama: men gruggini av tí, allir hinir vondu jarðarinnar skulu vinda *tey* úr, *og* drekka *tey*.

9 Men eg vil kunngera um ævir; eg vil syngja *lov*prís*ing*ar til Guðs Jákobs.

10 Øll horn teirra vondu eisini vil eg skera av; *men* horn teirra rættvísu skulu verða upphevjað.

PSÁLMUR 76

Til hins hægsta Tónleikara á Nĕ´-gī-nōth, Ein Psálmur *ella* Songur av Á-săph-i.

Í JUDAH *er* Guð kendur: hans navn *er* stórt í Ísrael.

2 Í Sā´-lĕm eisini er hansara tabernakkul, og hansara bústaður í Zion.

3 Har breyt hann bogans ørvar, skjøldurin, og svørðið, og bardagan. Sē´-lâh.

4 Tú *ert* meiri dýrdsamur *og* avbærur enn veiðinnar fjøll.

5 Hinir stinnhjartaðu eru rændir, teir hava sovið sín svøvn: og eingir av megnarmonnunum hava funnið sínar hendur.

6 Við tína hartan, O Guð Jákobs, bæði *her*vagnurin og rossið verða kastað inn í ein djúpan svøvn.

7 Tú, *enntá* tú, *eigurt* at verða óttaður: og hvør kann standa í tíni eygsjón, tá ið ēinaferð tú ert óður?

8 Tú veldurt dómi at verða hoyrdum frá himni; jørðin óttaðist, og var still,

9 Tá ið Guð reistist til dóms, at frelsa allar hinar eyðmjúku jarðarinnar. Sē´-lâh.

10 Vissuliga, vreiðin hjá manni skal prísa tær: hitt eftirverandi av vreiði skalt tú afturhalda.

11 Streingið heiti, og rindið at HARRANUM Guði tykkara: lat allar, sum veri *seg* rundan um hann, føra gávur at honum sum átti at verða óttaður.

12 Hann skal skera av andan hjá prinsum: *hann er* ræðuligur fyri kongum jarðarinnar.

PSÁLMUR 77

Til hins hægsta Tónleikara, til Jĕ´-dū-thûn, Ein Psálmur av Á-săph-i.

EG rópti á Guð við míni rødd, *enntá* á Guð við míni rødd; og hann lænti oyra at mær.

2 Á deginum av míni trongd, eg søkti Harran: mítt sár rann um náttina, og helt ei uppat: mín sál sýtti at verða uggað.

3 Eg mintist Guð, og varð órógvaður: eg klagaði, og mín andi var undirdíktur. Sē´-lâh.

4 Tú heldurt eygum mínum vakandi: eg eri so órógvaður, at eg ei fái talað.

5 Eg havi umhugsað dagarnar í fordum, árini av fornum tíðum.

6 Eg kalli til endurminningar mín sang um náttina: eg samtali við mítt egna hjarta: og mín andi gjørdi dúgliga rannsókn.

7 Vil Harrin kasta av um ævir? og vil hann vera góðvildarsamur ei meira?

8 Er hansara miskunn heilt farin um ævir? svíkur *hansara* lyfti um ævirmeir?

9 Hevur Guð gloymt at vera náðisamur? hevur hann í firtni lokað fyri sínum eymu miskunnum? Sē´-lâh.

10 Og eg segði, Hetta *er* veikleiki mín: *men eg vil minnast* árini av høgru hond hins mest Høga.

11 Eg vil minnast til verkini hjá HARRANUM: vissuliga, eg vil minnast tíni undur frá gomlum *av*.

12 Eg vil grunda eisini um alt títt verk, og tala um tínar gerningar.

13 Tín vegur, O Guð, *er* í halgidóminum: hvør *er so* mikil ein Guð sum Guð *vár?*

14 Tú *ert* tann Guð sum gert undur˘: tú hevurt kunngjørt tína styrki millum fólksins.

15 Tú hevurt við *tínum* armi endurloyst títt fólk, synir Jákobs og Jósephs. Sē´-lâh.

16 Vøtnini sóu teg, O Guð, vøtnini sóu teg; tey vóru rædd: dýpdirnar eisini vórðu órógvaðar.

17 Skýggini heltu út vatn: skýggini sendu út eitt ljóð: tínar ørvar eisini fóru útumkring.

18 Røddin á tíni toru *var* í himninum: snarljósini lýsnaðu heimin: jørðin nøtraði og skalv.

19 Tín vegur *er* í sjónum, og tín rás í hinum miklu vøtnum, og tíni fótafet eru ei kend.

20 Tú leiddirt títt fólk líkasum eitt *seyða*fylgi við hendi Móse og Aarons.

PSÁLMUR 78

Más´-chĭl av Á´-săph-i.

LÆNIÐ oyra, O fólk mítt, *til* mína lóg: bendið tykkara oyru til orðini av mínum munni.

2 Eg vil opna mín munn í eini dømisøgu: eg vil mæla myrkar framsagnir frá gomlum *av:*

3 Sum vit hava hoyrt og kent, og okkara fedrar hava sagt okkum.

4 Vit vilja ikki fjala *tær* fyri teirra børnum, sýnandi fyri ættini, sum koma skal, HARRANS *lovprísing*ar, og hansara styrki, og hans undurfullu verk sum hann hevur gjørt.

5 Tí hann grundfesti ein vitnisburð í Jákobi, og útnevndi eina lóg í Ísrael, sum hann ábeyð okkara fedrum, at teir skulu gera tær kunnar fyri børnum sínum:

6 At ættin, sum koma skal, mátti kenna *tey, enntá* børnini *sum* skuldu verða fødd; *sum* skuldu reisast og kunngera *tey* fyri børnum sínum:

7 At teir máttu seta sína vón á Guð, og ikki gloyma Guðs verk, men halda hansara boð:

8 Og máttu ikki verðið sum teirra fedrar, ein tvørlynd og uppreistrarsom ætt; ein ætt, *sum* ei setti sítt hjarta til rættis, og hvørs andi var ikki støðufastur hjá Guði.

9 Ē´-phră-ĭm-s børn, *verandi* vígbúnir, *og* berandi bogar, vendu tilbakar á degi bardagans.

10 Teir hildu ikki Guðs sáttmála, og sýttu at ganga í hansara lóg;

11 Og gloymdu hansara verk, og hans undur sum hann hevði sýnt teimum.

12 Undrunarsom ting hann gjørdi í eygsjónini á teirra fedrum, í Egyptalandi, *í* Zō´-ăn-s akri.

13 Hann atskildi sjógvin, og voldi teimum at fara ígjøgn; og hann fekk vøtnini at standa sum ein rúgva.

14 Um dagsleitið eisini hann leiddi teir við einum skýggi, og alla náttina við einum ljósi av eldi.

15 Hann kleyv klettarnar í oyðuni, og gav *teimum* drekka sum *úr* hinum miklu dýpdum.

16 Hann førdi streymar eisini burtur úr klettinum, og voldi vøtnum at renna niður líkasum áir.

17 Og teir syndaðu tess meira ímóti honum, við at upptirra hin mest Høga í oyðuni.

18 Og teir freistaðu Guð í sínum hjørtum, við at umbiðja mat til sína girnd.

19 Ja, teir talaðu ímóti Guði; teir søgdu, Kann Guð reiða eitt borð í oyðuni?

20 Sí, hann sló klettin, *so* at vøtnini gustu út, og streymarnir floymdu yvir; kann hann geva breyð eisini? kann hann útvega kjøt til sítt fólk?

21 HARRIN tessvegna hoyrdi *hetta,* og varð vreiður: so ein eldur varð kyndur ímóti Jákobi, og firtni eisini kom upp ímóti Ísrael;

22 Av tí at teir trúðu ei á Guð, og litu ikki á hans frelsu:

23 Hóast hann hevði áboðið skýggjunum frá úr erva, og latið upp hurðar himins,
24 Og hevði regnað niður mǎnńa omanyvir teir at eta, og hevði givið teimum av korni himins.
25 Maður át einglamat: hann sendi teim mat til hins fulnar.
26 Hann elvdi einum eystanvindi at blása í himninum: og viðˆ sínum mátti hann førdi inn sunnanvindin.
27 Hann regnaði kjøt eisini uppá teir sum støv, og fjaðraðar fuglar sum sand havsins:
28 Og hann læt *tað* detta í miðjuna av teirra leiri, rundan um teirra býlir.
29 So teir ótu, og vórðu væl mettaðir: tí hann gav teimum teirra egnu tráan;
30 Teir vórðu ikki fremmandgjørdir frá síni girnd. Men meðan teirra matur *var* enn í teirra munnum,
31 Kom Guðs vreiði omanyvir teir, og vó hinar feitastu av teimum, og sló niður hinar útvaldu *menn* Ísraels.
32 Fyri alt hetta teir syndaðu enn, og trúðu ei fyri hans undurfullu verk.
33 Tí upptærdi hann teirra dagar í fáfongd, og teirra árˇ í trongd.
34 Tá ið hann vá teir, tá søktu teir hann: og teir vendu aftur og fregnaðust árla eftir Guði.
35 Og teir mintust, at Guð *var* teirra klettur, og hin høgi Guð teirra endurloysnari.
36 Hóast hetta, teir smikraðu honum við sínum munni, og teir lugu at honum við sínum tungum.
37 Tí at teirra hjarta var ikki rætt við honum, eiheldur vóru teir støðufastir í hansara sáttmála.
38 Men hann, *verandi* fullur av várkunn, fyrigav *teirra* misgerð, og oyddi *teir* ei: ja, manga ferðina hann vendi síni firtni burt, og østi ikki upp alla sína vreiði.
39 Tí at hann mintist, at teir *vóru bert* kjøt; ein vindur sum ferðast avstað, og kemur ikki aftur.
40 Hvør ofta teir tirraðu hann í oyðuni, *og voldu* honum harm í oyðimørkini!
41 Ja, teir vendu tilbakar og freistaðu Guð, og avmarkaðu Hin Heilaga Ísraels.
42 Teir mintust ikki til hans hond; *ella* dagin, tá ið hann fríaði teir út frá figgindanum.
43 Hvussu hann hevði virkað síni tekin í Egyptalandi, og síni undur í Zŏ́-ăn-s akri:
44 Og hevði broytt teirra áir yvirí blóð; og teirra flóðir, at teir ei fingu drukkið.
45 Hann sendi ymis sløg av flugum teirra millum, sum slúkaðu teir; og froskar, sum oyddu teir.
46 Hann gav eisini teirra grøði at jarðvarginum, og teirra strev innat flyti-grashoppuni.
47 Hann oyddi teirra víngarðar við hegli, og teirra morberjatrø við frosti.
48 Hann gav upp teirra fenað eisini til heglið, og teirra fylgir til heit torukílir.
49 Hann kastaði uppá teir øgiligleikan av síni firtni, vreiði, og harmavreiði, og trongd, við at senda óndar einglar *teirra millum*.
50 Hann gjørdi ein veg fyri síni firtni; hann spardi ei teirra sál frá deyða, men gav teirra lív yvir til drepsóttina;
51 Og sló allar teir frumbornu í Egyptalandi; tað fremsta av *teirra* styrki í Hams tabernaklum:
52 Men fekk sítt egna fólk at fara avstað sum seyð, og leiddi teir í oyðuni sum eitt fylgi.
53 Og hann leiddi teir áfram tryggliga, so at teir óttaðust ei:

men sjógvurin floymdi yvir teirra fíggindar.
54 Og hann førdi teir til markið av sínum halgidómi, *enntá til* hetta fjall, *sum* hans høgra hond hevði keypt.
55 Hann kastaði út hinar heidnu eisini frammi fyri teimum, og skifti teimum ein arv eftir linju, og fekk ættargreinir at búgva í teirra tjøldum.
56 Tó freistaðu og tirraðu teir hin mest høga Guð, og hildu ikki hans vitnisburðir:
57 Men vendu tilbakar, og handlaðu ótrútt eins og teirra fedrar: teir vórðu vendir til viks eins og ein svikaligur bogi.
58 Tí at teir tirraðu hann til firtnis við sínum høgu plássum, og rørdu hann til ástbrelnis við sínum ristu myndum.
59 Tá ið Guð *hetta* hoyrdi, varð hann vreiður, og stórligani stóðst við Ísrael:
60 So at hann yvirgav Sjī´-lôh-s tabernakkul; tjaldið, *sum* hann staðsetti manna millum;
61 Og flýggjaði sína styrki inn í fangaskap, og sína dýrd inn í fíggindans hond.
62 Hann gav sítt fólk yvir eisini at svørðinum; og var vreiður við sín arv.
63 Eldurin upptærdi teirra ungu menn; og teirra moyggjar vórðu ikki givnar í giftu.
64 Teirra prestar fullu viðˆ svørðinum; og teirra einkjur gjørdu einkið harmljóð.
65 Tá vaknaði Harrin sum ēin úr svøvni; *og* eins og ein mektigur maður sum rópar vegna vín.
66 Og hann sló sínar fíggindar í hinar aftaru partar: hann gjørdi teir til varandi skammar.
67 Harafturat havnaði hann tabernakli Jósephs, og valdi ikki ættargrein Ē´-phră-ĭm-s:
68 Men valdi ættargrein Judah; fjallið Zion, sum hann elskaði.
69 Og hann bygdi sín halgidóm líka *sum* høg *slott;* líka *sum* jørðin, sum hann hevur grundfest um ævir.
70 Hann valdi Dávid eisini, sín tænara, og tók hann frá seyðabyrgjunum:
71 Frá at fylgja ærnum – miklar við ungum, førdi hann hann til at føða Jákob sítt fólk, og Ísrael sín arv.
72 So hann mataði teir samsvarandi við heilleikan av sínum hjarta; og vegleiddi teir viðˆ hegnini av sínum hondum.

PSÁLMUR 79

Ein Psálmur av Á-săph-i.

O GUÐ, hinir heidnu eru komnir inn í arv tín; títt heilaga tempul hava teir dálkað; teir hava lagt Jerusalem í rúgvur.
2 Hinar deyðu kropparnar av tínum tænarum hava teir givið *til at vera* matur at fuglum himins, kjøtið av tínum heilagu at djórum jarðarinnar.
3 Teirra blóð hava teir helt *út* eins og vatn rundan um Jerusalem; og *tað var* eingin at jarða *teir*.
4 Vit eru vorðnir eitt háð fyri okkara grannum, eitt spott og spæ fyri teimum ið eru rundan um okkum.
5 Hvussu leingi, HARRI? vilt tú vera firtin um ævir? skal tín ástbrelni brenna sum eldur?
6 Hell út tína vreiði uppá hinar heidnu sum ei hava kent teg, og uppá kongadømini sum ei hava kallað uppá títt navn.
7 Tí at teir hava etið upp Jákob, og lagt *í* oyði hansara bústað.
8 O minst ikki til ímóti okkum fyrri misgerðir: lat tínar eymu miskunnir skundisliga koma okkum á møti: tí at vit eru førdir sera lágt.
9 Hjálp okkum, O Guð frelsu várar, fyri dýrd navns tíns: og út-

fría okkum, og reinska burt okkara syndir, fyri navns tíns skuld.

10 Hvørsvegna skuldu hinir heidnu siga, Hvar *er* Guð teirra? lat hann verða kendan hinna heidnu millum í vári eygsjón, *við* hevningini av blóði tænara tína *sum er* úthelt.

11 Lat suffingina hjá fanganum koma framfyri teg; samsvarandi við mikilleikan av tínum mátti, varðveit tú teir sum eru útnevndir til at doyggja;

12 Og rinda okkara grannum sjeyfalt inn í teirra favn teirra spott, hvarvið teir hava spottað teg, O Harri.

13 So vit, títt fólk og seyður*in* av tínum beiti, vilja veita tær tøkkir um ævir: vit vilja sýna fram prís títt til allar ættir.

PSÁLMUR 80

Til hins hægsta Tónleikara uppá Sjôsjänn´ïm-Ē´-dŭth, Ein Psálmur av Á´-săph-i.

LÆN oyra, O Hirði Ísraels, tú sum leiðirt Joseph sum eitt fylgi; tú sum býrt *ímillum* chêr-ûbĭm´-arnar, skín fram.

2 Frammi fyri Ē´-phră-ĭm og Benjamin og Mă-năs´-sēh øs upp tína styrki, og kom *og* frels okkum.

3 Vend okkum aftur, O Guð, og fá títt andlit at skína; og vit skulu verða frelstir.

4 O HARRI Guð herliðanna, hvør leingi vilt tú vera firtin inná bønina hjá tínum fólki?

5 Tú matart teir við tárabreyðinum; og gevurt teim tár˘ at drekka í miklum máti.

6 Tú gert okkum *til* eitt klandur at okkara grannum: og okkara fíggindar flenna sín ámillum.

7 Vend okkum aftur, O Guð herliðanna, og fá títt andlit at skína; og vit skulu verða frelstir.

8 Tú hevurt ført eitt víntræ út úr Egyptalandi: tú hevurt kastað út hinar heidnu, og plantað tað.

9 Tú fyribúðirt *rúm* frammi fyri tí, og fekst tað at sláa djúpa rót, og tað fylti landið.

10 Heyggjarnir vórðu dekkaðir við skugganum av tí, og greinarnar hjá tí *vóru sum* hini frálíku sedris*trø*.

11 Hon sendi út sínar bular at sjónum, og sínar kvistar at ánni.

12 Hví hevurt tú *tá* brotið niður hennara byrgir, so at allir teir, sum fara framvið eftir veginum, slíta *av* henni?

13 Villsvínið úr skóginum oyðir tað, og villdjórið av akrinum gloypir tað.

14 Vend aftur, vit bøna teg, O Guð herliðanna: hygg niður frá himni, og skoða, og vitja hetta víntræ;

15 Og víngarðin sum tín høgra hond hevur plantað, og greinina *sum* tú gjørdirt sterka til tín sjálvs.

16 *Hon er* brend við eldi, *hon er* skorin niður: tey farast við hartanina av tíni ásjón.

17 Lat tína hond vera uppiá manni høgru handar tínar; uppiá menniskjusyninum, *hvønn* tú gjørdirt sterkan til tín sjálvs.

18 So vilja ikki vit fara tilbakar frá tær: lívga okkum, og vit vilja kalla uppá navn títt.

19 Vend okkum aftur, O HARRI Guð herliðanna, fá títt andliti at skína; og vit skulu verða frelstir.

PSÁLMUR 81

Til hins hægsta Tónleikara uppá Gĭt´-tĭth, *Ein Psálmur* av Á´-săph-i.

SYNGIÐ hart yvirfyri Guði, okkara styrki: gerið eitt frødligt ljóð yvirfyri Guði Jákobs.

2 Takið ein psálm, og førið higar tamburínina, hina dámligu hørpu við psaltrinum.

3 Blásið upp lúðurin í nýmánanum, í tí ásettu tíðini, á okkara hátíðarliga veitsludegi.

4 Tí at hetta *var* ein áseting

til Ísraels, *og* ein lóg hjá Guði Jákobs.
5 Hetta fyriskipaði hann í Jósephi *til* ein vitnisburð, tá ið hann fór út gjøgnum Egyptaland: *har* eg hoyrdi eitt tungumál *sum* eg skilti ikki.
6 Eg firraði hans øksl frá byrðuni: hans hendur vórðu útfríaðar frá pottunum.
7 Tú kallaðirt í trongd, og eg útfríaði teg; eg svaraði tær í hinum loynda toru-plássi: eg royndi teg við Mêr´-î-bâh vøtn. Sē´-lâh.
8 Hoyr, O fólk mítt, og eg vil vitna at tær: O Ísrael, um tú vilt geva gætur at mær;
9 Tað skal eingin fremmandur gudur vera í tær; eiheldur skalt tú tilbiðja nakran fremmandan gud.
10 Eg *eri* HARRIN Guð tín, sum førdi teg út úr Egyptalandi: opna munn tín vítt, og eg vil fylla hann.
11 Men fólk mítt vildi ei geva gætur eftir rødd míni; og Ísrael vildi einkið av mær *vita*.
12 So eg gav teir upp at girnd egnu hjartna teirra: *og* teir gingu í sínum egnu ráðum.
13 Á, at mítt fólk hevði givið gætur at mær, *og* Ísrael hevði gingið í mínum vegum!
14 Eg skuldi skjótt havt undirlagt teirra figgindar, og vent mína hond ímóti teirra mótstandarum.
15 Hatararnir av HARRANUM skuldu havt undirgivið seg at honum: men teirra tíð skuldi havt vart um ævir.
16 Hann skuldi havt føtt teir eisini við tí fínasta av hveitinum: og við hunangi úr klettinum skuldi eg havt mettað teg.

PSÁLMUR 82

Ein Psálmur av Á´sāph-i.

GUÐ stendur í samkomu teirra mektigu; hann dømir gudanna millum.
2 Hvør leingi vilja tit døma órættlátligani, og taka ímóti persónum teirra vondu? Sē´-lâh.
3 Verjið hin fátæka og tørvandi: innið rættvísi mót hinum nívda og tørvandi.
4 Bjargið tí fátæka og tørvandi: reddið *teimum* út úr hond teirra vondu.
5 Teir vita ikki, eiheldur vilja teir skilja; teir ganga áfram í myrkri: allir grundvøllir jarðarinnar eru úti úr kós.
6 Eg havi sagt, Tit *eru* gudar; og allir av tykkum *eru* børn hjá tí mest Høga.
7 Men tit skulu doyggja eins og menn, og falla líka *sum* ēin av prinsunum.
8 Reis *teg,* O Guð, døm jørðina: tí at tú skalt arva allar tjóðir.

PSÁLMUR 83

Ein Songur *ella* Psálmur av Á´-sāph-i.

HALT ikki tú tøgn, O Guð: halt ikki friði tínum, og ver ikki stillur, O Guð.
2 Tí at sí, tínir fíggindar gera ein háva: og teir, sum hata teg, hava lyft upp høvdið.
3 Teir hava hildið snúugt ráð ímóti fólki tínum, og ráðført *seg* ímóti hinum fjaldu tínum.
4 Teir hava sagt, Komið, og latum okkum skera teir av frá *at vera* ein tjóð; at navn Ísraels má vera ei meira í minni.
5 Tí at teir hava ráðført *seg* saman ēinmælt: teir eru í samgongu ímóti tær:
6 Tabernakkul˘ Ē´-dóm-s, og Ísjmā-ē-līt´-arnir; úr Móab, og Hăgā-rēn´-arnir;
7 Gē´-băl, og Ammon, og Ā´mâ-lēk, Philistarnir við íbúgvum Týrusar;
8 Assur eisini er sameintur við teir: teir hava holpið Lots børnum. Sē´-lâh.
9 Ger teimum sum Mī-dī-ă-nīt´unum; sum *við* Sisera, sum *við* Jā´-bīn, við áarløk Kī´-sŏn-s:

10 *Sum* fórust við En-dor: teir gjørdust *sum* tað til jørðina.
11 Ger teirra tignarmenn eins og Ór´-ēb, og líka *sum* Zēēb: ja, allar teirra prinsar sum Zē´-bâh, og sum Zăl-mŭn´-nă:
12 Sum søgdu, Latum okkum taka til okkara sjálvs húsini hjá Guði í ogn.
13 O Guð mín, ger teir eins og eitt hjól; sum hálm frammi fyri vindinum.
14 Eins og eldurin brennur ein við, og eins og flamman setur eld í fjøllini;
15 Soleiðis søk at teimum við tínum ódnarvindi, og ger teir ræddar við tínum stormi.
16 Fyll teirra andlit við skomm; at teir mega søkja títt navn, O HARRI.
17 Lat teir verða fjamskaðar og órógvaðar um ævir; ja, lat teir verða settar til skammar, og týnast:
18 At *menn* mega vita, at tú, hvørs navn eina *er* JĒ-HŌ´-VÄH, *ert* hin mest høgi yvir allari jørðini.

PSÁLMUR 84

Til hins hægsta Tónleikara uppá Gĭt´-tĭth,
Ein Psálmur fyri Kōr´-âh synir.

HVØR elskulig *eru* tabernakkul tíni, O HARRI herliðanna!
2 Sál míni leingist, ja, enntá maktast eftir forgørðum HARRANS: mítt hjarta og mítt kjøt rópar út eftir hinum livandi Guði.
3 Ja, spurvin hevur funnið eitt hús, og svalin eitt reiður til sín sjálvs, har hon kann leggja sínar ungar, *enntá* tíni altar, O HARRI herliðanna, Kongur mín, og Guð mín.
4 Vælsignaðir *eru* teir sum búgva í húsi tínum: teir vilja vera enn prísandi tær. Sē´-lâh.
5 Vælsignaður *er* tann maður, hvørs styrki *er* í tær; í hvørs hjarta *eru* vegirnir *av teim*.
6 *Hvørjir,* farandi ígjøgnum Bā´-că dalin, gera hann *til* eitt keldu*lop;* regnið eisini hyljarnar fyllir.
7 Teir fara frá styrki til styrki, *hvør og ēin av teimum* í Zion birtist frammi fyri Guði.
8 O HARRI Guð herliðanna, hoyr mína bøn: læn oyra, O Guð Jákobs. Sē´-lâh.
9 Siggj, O Guð várt skjøldur, og hygg uppá andlit salvaða tíns.
10 Tí ein dagur í tínum forgørðum *er* betri enn túsund. Eg hevði heldur verið ein duravørður í Guðs míns húsi, enn at búð í vondskunnar tjøldum.
11 Tí HARRIN Guð *er* ein sól og skjøldur: HARRIN vil geva náði og dýrd: einkið gott *ting* vil hann afturhalda frá teimum sum ganga reiðiliga.
12 O HARRI herliðanna, vælsignaður *er* tann maður sum troystar á teg.

PSÁLMUR 85

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur fyri Kōr´-âh synir.

HARRI, tú hevurt verið góðvildarsamur at tínum landi: tú hevurt ført tilbakar fangaskap Jákobs.
2 Tú hevurt fyrigivið misgerðina hjá tínum fólki, tú hevurt dekkað alla teirra synd. Sē´-lâh.
3 Tú hevurt tikið burt alla tína vreiði: tú hevurt vent *tær* frá ógvusligsemini av tíni firtni.
4 Vend okkum, O Guð frelsu várar, og fá tína firtni ímóti okkum at halda uppat.
5 Vilt tú vera firtin við okkum um ævir? vilt tú draga út tína firtni til allar ættir?
6 Vilt tú ikki endurlívga okkum aftur: at fólk títt má fegnast í tær?
7 Sýn okkum tína miskunn, O HARRI, og veit okkum frelsu tína.

8 Eg vil hoyra hvat Guð HARRIN vil tala: tí at hann vil tala frið við sítt fólk, og til sínar heilagu: men lat teir ei venda aftur til dárskap.
9 Vissuliga, hansara frelsa *er* nær teimum sum óttast hann; at dýrd má búgva í landi várum.
10 Miskunn og sannleiki eru møtt saman; rættvísi og friður hava kyst *hvørt annað*.
11 Sannleiki skal spretta úr jørðini; og rættvísi skal hyggja niður frá himni.
12 Ja, HARRIN skal geva *tað sum er* gott; og okkara land skal veita hennara grøði.
13 Rættvísi skal fara undan honum; og skal seta *okkum* í vegi fótspora hans.

PSÁLMUR 86

Ein Bøn av Dávidi.

BOYGG niður títt oyra, O HARRI, hoyr meg: tí at eg *eri* armur og tørvandi.
2 Varðveit sál mína; tí at eg *eri* heilagur: O tú Guð mín, frels tænara tín sum lítur á teg.
3 Ver miskunnarfullur at mær, O Harri: tí at eg rópi á teg dagliga.
4 Fegna sál tænara tíns: tí at til tín, O Harri, lyfti eg upp mína sál.
5 Tí at tú, Harri, *ert* góður, og tilreiðar at fyrigeva; og ríkiligur í miskunn at øllum teimum sum kalla uppá teg.
6 Læn oyra, O HARRI, at míni bøn; og gáa eftir røddini á mínum umbøningum.
7 Á deginum av míni trongd vil eg kalla uppá teg: tí at tú vilt svara mær.
8 Millum gudanna *er tað* eingin líkur tær, O Harri; eiheldur *eru nøkur verk* lík verkum tínum.
9 Allar tjóðir, hvørjar tú hevurt gjørt, skulu koma og tilbiðja frammi fyri tær, O Harri; og skulu dýrðmeta navn títt.
10 Tí at tú *ert* mikil, og gert undursom ting: tú *ert* Guð aleinaur.
11 Lær meg tín veg, O HARRI; eg vil ganga í sannleika tínum: sameina mítt hjarta at óttast títt navn.
12 Eg vil prísa tær, O Harri Guð mín, við øllum hjarta mínum: og eg vil dýrðmeta títt navn um ævirmeir.
13 Tí at mikil *er* miskunn tín mótvegis mær: og tú hevurt útfríað mína sál frá hinum lægsta helviti.
14 O Guð, hinir dramblátu eru risnir ímóti mær, og savnaðirnir av harðligum *monnum* hava søkt eftir míni sál; og hava ikki sett teg frammi fyri sær.
15 Men tú, O Harri, *ert* ein Guð — fullur av várkunn, og náðisamur, langmóðigur, og ríkiligsamur í miskunn og sannleika.
16 O vend at mær, og hav miskunn yvir meg; gev tína styrki at tænara tínum, og frels son tænastumoyar tínar.
17 Sýn mær eitt tekin til gott; at teir, ið hata meg, mega sjá *tað,* og skammast: av tí at tú, HARRI, hevurt hjálpt mær, og uggað meg.

PSÁLMUR 87

Ein Psálmur *ella* Songur fyri Kör'-äh synir.

HANS grundvøllur *er* í hinum heilagu fjøllum.
2 HARRIN elskar Zions portur meir enn allar bústaðir Jákobs.
3 Dýrdsom ting eru talaði um teg, O staður Guðs. Sĕ'-lâh.
4 Eg vil nevna um Ráhab og Bábylon fyri teimum sum kenna meg: sí Philistiu, og Týrus, við Ê-thĭ-ō'-pĭ-u; hesin *maður* varð føddur har.
5 Og um Zion skal tað verða sagt, Hesin og hasin maður varð føddur í henni: og hin hægsti sjálvur skal grundfesta hana.

6 HARRIN skal telja, tá ið hann skrivar upp fólkið, *at* hesin *maður* varð føddur har. Sē´-lâh.

7 Eins væl sangararnir, sum spælararnir á ljóðførir, *skulu vera har:* allar mínar keldur *eru* í tær.

PSÁLMUR 88

Ein Songur *ella* Psálmur fyri Kōr´-ăh synir, til hin fremsta Tónleikara uppá Má´-hâ-lăth Lĕ-ăn´-nōth, Măs´-chīl av Hē´-măn Ĕz-ră-hīt´-a.

O HARRI Guð frelsu mínar, eg havi rópað dag *og* nátt frammi fyri tær:

2 Lat mína bøn koma framfyri teg: boygg títt oyra at mínum rópi;

3 Tí at sál mín er full av trongdum: og mítt lív dregur nær at grøvini.

4 Eg verði roknaður við teimum sum fara niður inn í holuna: eg eri sum ein maður *sum* onga styrki *hevur:*

5 Fríur hinna deyðu millum, sum hinir vignu sum liggja í grøvini, hvørjar tú minnirst ei meir: og teir eru skornir av frá tíni hond.

6 Tú hevurt lagt meg í hina lægstu holu, í myrkur, í dýpini.

7 Tín vreiði liggur strítt uppiá mær, og tú hevurt nívt *meg* við øllum bárum tínum. Sē´-lâh.

8 Tú hevurt sett burtur mín kennskap fjart frá mær; tú hevurt gjørt meg *til* eina andstygd at teimum: *eg eri* lokaður inni, og eg kann ei koma fram.

9 Mítt eyga harmast vegna nívd: HARRI, eg havi dagliga kallað uppá teg, eg havi rætt út mínar hendur at tær.

10 Vilt tú sýna undur*gerðir* fyri teimum deyðu? skulu teir deyðu reisast *og* prísa tær? Sē´-lâh.

11 Skal tín elskandi blídni verða kunngjørd í grøvini? *ella* tín trúfesti í oyðing?

12 Skulu tíni undur verða kend í myrkrinum? og tín rættvísi í gloymskuseminnar landi?

13 Men á teg havi eg rópt, O HARRI; og um morgunin skal mín bøn koma tær á møti.

14 HARRI, hví kastart tú frá mína sál? *hví* fjalirt tú andlit títt frá mær?

15 Eg *eri* nívdur og tilreiðar at doyggja frá *mínum* ungdómi uppeftir: *meðan* eg líði tínar ræðslur, eri eg hugspjaddur.

16 Tín ógvusliga vreiði gongur yvir meg; tínar ræðslur hava skorið meg av.

17 Tær komu rundan um meg dagliga líkasum vatn; tær umringaðu meg umkring tilsaman.

18 Elskara og vin hevurt tú koyrt fjart frá mær, *og* mín kennskap inn í myrkur.

PSÁLMUR 89

Măs´-chīl av Ē´-thăn Ĕz-ră-hīt´-a.

EG vil syngja um miskunnir HARRANS um ævir: við mínum munni vil eg gera kunna tína trúfesti fyri øllum ættum.

2 Tí at eg havi sagt, Miskunn skal verða bygd upp um ævir: tína trúfesti skalt tú grundfesta í sjálvum himnunum.

3 Eg havi gjørt ein sáttmála við mín útvalda, eg havi svorið at Dávidi mínum tænara,

4 Títt sáð vil eg grundfesta um ævir, og byggja upp títt hásæti til allar ættir. Sē´-lâh.

5 Og himnarnir skulu prísa tínum undrum, O HARRI: tíni trúfesti eisini í samkomu teirra heilagu.

6 Tí at hvør í himninum kann verða samborin HARRANUM? *hvør* millum sona hinna mektigu kann verða líknaður HARRANUM?

7 Guð eigur stórligani at verða óttaður í samkomu teirra heilagu, og at verða hildin í virðingarótta av øllum *teimum sum eru* umkring hann.

8 O HARRI Guð herliðanna, hvør *er* ein sterkur HARRI líkt at

tær? ella við tína trúfesti rundan um teg?

9 Tú stjórnart havsins bralan: tá ið tess aldur reisast, tú stillirt tær.

10 Tú hevurt brotið Ráhab í stykkir, sum ēin ið er vigin; tú hevurt spjatt tínar figgindar við tínum sterka armi.

11 Himnarnir *eru* tínir, jørðin eisini *er* tín: *hvat viðvíkur* verøldini og hennara fylling, tú hevurt grundlagt tey.

12 Norðan og sunnan, tú hevurt skapt tey: Tā́bôr og Hĕŕmōn skulu fegnast í navni tínum.

13 Tú hevurt ein mektigan arm: sterk er hond tín, *og* høg er tín høgra hond.

14 Rættvísi og dómur *eru* bústaðurin av tíni trónu: miskunn og sannleiki skulu ganga undan andliti tínum.

15 Vælsignað *er* tað fólk sum kenna hitt frødliga ljóð: tey skulu ganga, O HARRI, í ljósinum av tíni ásjón.

16 Í tínum navni skulu tey fegnast allan dagin: og í tíni rættvisi skulu tey verða upphevjað.

17 Tí at tú *ert* dýrdin av teirra styrki: og í tínum góðtokka skal okkara horn verða upphevjað.

18 Tí at HARRIN *er* okkara verja; og Hin Heilagi Ísraels *er* okkara kongur.

19 Tá talaðirt tú í sjón til hins heilaga tíns, og segðirt, Eg havi lagt hjálp uppá *ēin sum er* mektigur; eg havi upphevjað *ēin* útvaldan burtur úr fólkinum.

20 Eg havi funnið Dávid mín tænara; við míni heilagu olju havi eg salvað hann:

21 Við hvørjum hond mín skal verða grundfest: mín armur eisini skal styrkja hann.

22 Fíggindin skal ikki krevja uppá hann; ella vondskunnar sonur kvølja hann.

23 Og eg vil berja niður hans óvinir frammi fyri andliti hans, og plága teir sum hata hann.

24 Men mín trúskapur og mín miskunn *skulu vera* við honum: og í navni mínum skal hansara horn verða upphevjað.

25 Eg vil seta hansara hond eisini í sjógvin, og hansara høgru hond í áirnar.

26 Hann skal rópa á meg, Tú *ert* faðir mín, Guð mín, og klettur frelsu mínar.

27 Eg eisini vil gera hann *til* frumborna *mín,* hægri enn kongar jarðarinnar.

28 Mína miskunn vil eg varðveita til hansara um ævirmeir, og mín sáttmáli skal standa fastur við honum.

29 Hansara sáð eisini vil eg fáa *at vara* um ævir, og hans hásæti sum dagar himins.

30 Um hansara børn yvirgevi mína lóg, og gangi ikki í mínum dómum;

31 Um teir bróti mínar áseting-ar, og haldi ei míni boð;

32 Tá vil eg heimsøkja teirra misbrot við stavinum, og teirra misgerð við fleingjum.

33 Hóast hetta, mína elskandi blíðni vil eg ikki aldeilis taka frá honum, ella loyva mín trúskap at svitast.

34 Mín sáttmála vil eg ikki bróta; ella broyta tað ting sum er farið út av varrum mínum.

35 Ēina ferð havi eg svorið við heilagleika mín, at eg vil ikki lúgva at Dávidi.

36 Hansara sáð skal vara um ævir, og hansara tróna sum sólin frammi fyri mær.

37 Tað skal vera grundfest um ævir sum mánin, og *sum* eitt trúfast vitni í himni. Sḗlâh.

38 Men tú hevurt kastað av og stiknast, tú hevurt verið vreiður við salvaða tín.

39 Tú hevurt gjørt ógildan sáttmála tænara tíns: tú hevurt

vanhalgað hansara krúnu, *við at kasta hana* til jarðarinnar.
40 Tú hevurt brotið niður allar hansara girðingar; tú hevurt ført hansara hervirkir til oyðingar.
41 Allir, sum ferðast eftir veginum, ræna hann: hann er eitt spott fyri grannum sínum.
42 Tú hevurt sett upp høgru hondina hjá hansara mótstandarum; tú hevurt fingið allar hansara fíggindar at fegnast.
43 Tú hevurt eisini vent eggini á hansara svørði, og hevurt ikki fingið hann at standast í bardaganum.
44 Tú hevurt fingið hansara dýrd at halda uppat, og kastað hans hásæti niður til jarðarinnar.
45 Dagarnar av hans ungdómi hevurt tú stytt: tú hevurt dekkað hann við skomm. Sē´-lâh.
46 Hvør leingi, HARRI? vilt tú fjala teg um ævir? skal vreiði tín brenna sum eldur?
47 Minst til hvussu stutt mín tíð er: hví hevurt tú gjørt allar menn til fánýtis?
48 Hvør maður *er hann sum* livir, og skal ikki sjá deyða? skal hann bjarga síni sál frá gravarinnar hond? Sē´-lâh.
49 Harri, hvar *eru* tínar fyrru elskandi blíðsemir, *sum* tú svórt innat Dávidi í tínum sannleika?
50 Minst til, Harri, háðið av tínum fíggindum; *hvussu* eg beri í mínum barmi *háðið av* øllum tí mektiga fólkinum;
51 Við hvørjum tínir fíggindar hava háðað, O HARRI; við hvørjum teir hava háðað fótafetini hjá tínum salvaða.
52 Vælsignaður *veri* HARRIN um ævirmeir. Á´-mën, og Á´-mën.

PSÁLMUR 90

Ein Bøn av Guðs manninum Mósesi.

HARRI, tú hevurt verið okkara bústaður í øllum ættum.
2 Áðrenn fjøllini vórðu førd fram, ella nakrantíð tú hevðirt myndað jørðina og heimin, enntá frá ævigtvarandi til ævigtvarandi, tú *ert* Guð.
3 Tú snýrt manni til oyðingar; og sigurt, Vendið aftur, tit mannabørn.
4 Tí at túsund ár í tíni eygsjón *eru bert* eins og gjárdagur*in*, tá ið hann er liðin, og *sum* ein vøka um náttina.
5 Tú bert teir avstað sum við eini flóð; teir eru *sum* ein svøvnur: um morgunin *eru teir* eins og gras *sum* veksur upp.
6 Um morgunin blómkar tað, og veksur upp; um kvøldið verður tað skorið niður, og følnar.
7 Tí at vit verða upptærdir við tíni firtni, og við tíni vreiði verða vit órógvaðir.
8 Tú hevurt sett várar misgerðir frammi fyri tær, várar loyndu *syndir* í ljósið av tíni ásjón.
9 Tí at allir okkara dagar verða ferðaðir avstað í tíni vreiði: vit brúka okkara ár sum ein søga *sum er søgd*.
10 Dagarnir av okkara árum *eru* trísinstjúgu ár og tíggju; og um, orsakað av styrki, *tey veri seg* fýrsinstjúgu ár, tó *er* teirra styrki strev og sorg; tí at tað verður skjótt skorið av, og vit flúgva avstað.
11 Hvør kennir máttin av tíni firtni? enntá samsvarandi við ótta tín, *soleiðis er* vreiði tín.
12 So lær *oss* at telja várar dagar, at vit mega virkja *vári* hjørtu at vísdómi.
13 Vend aftur, O HARRI, hvør leingi? og lat tað iðra teg viðvíkjandi tænarum tínum.
14 O metta okkum árla við tíni miskunn; at vit mega fegnast og vera glaðir allar okkara dagar.
15 Ger okkum glaðar samsvarandi við dagarnar, *hvarí* tú hevurt nívt okkum; *og* árini, *í hvørjum* vit hava sæð ilt.

16 Lat verk títt birtast tænarum tínum, og tína dýrd at teirra børnum.
17 Og lat vakurleika HARRANS Guðs várs vera uppiá okkum: og grundfest tú verkið av okkara hondum uppiá okkum; ja, verkið av okkara hondum, grundfest tú tað.

PSÁLMUR 91

HANN, ið býr í tí loynda plássi hins mest Høga, skal dvølja undir skugga Almáttugans.
2 Eg vil siga um HARRAN, *Hann er* mítt skjól og mín festningur: mín Guð; á hann vil eg líta.
3 Vissuliga, hann skal útfría teg frá snerru fugla*fanga*rans, *og* frá hini herviligu drepsótt.
4 Hann skal hylja teg við sínum fjaðrum, og undir hansara veingjum skalt tú *hava* álit: hansara sannleiki *skal vera tín* skjøldur og verja.
5 Tú skalt ei vera ræddur fyri ræðsluni á nátt; *ella* fyri ørvini, *sum* flýgur á degi;
6 *Ella* fyri drepsóttini, *sum* gongur í myrkri; *ella* fyri oyðingini, *sum* oyðir á middegi.
7 Túsund skulu falla tær við lið, og tíggju túsund við tína høgru hond; *men* tað skal ikki koma nær tær.
8 Einans við tínum eygum skalt tú skoða og síggja endurgjald teirra vondu.
9 Av tí at tú hevurt gjørt HARRAN, *sum er* mítt skjól, *enntá* hin mest Høga, *til* bústað tín;
10 Einkið ilt skal viðfara tær, eiheldur skal nøkur plága koma nær tínum bústaði.
11 Tí at hann skal geva einglum sínum álegging yvir teg, at varðveita teg í øllum tínum vegum.
12 Teir skulu bera teg uppi í *sínum* hondum, at ikki tú slái tín fót ímóti einum steini.
13 Tú skalt traðka uppá leyvuna og eiturormin: ta ungu leyvuna og drekan skalt tú trampa undir føtur.
14 Av tí at hann hevur sett sín kærleika uppá meg, tí vil eg útfría hann: eg vil seta hann til hæddar, av tí at hann hevur kent mítt navn.
15 Hann skal kalla uppá meg, og eg vil svara honum: eg *vil vera* við honum í trongd; eg vil bjarga honum, og æra hann.
16 Við longum lívi vil eg metta hann, og sýna honum mína frelsu.

PSÁLMUR 92

Ein Psálmur *ella* Songur til sabbatsdagin.

TAÐ er eitt gott *ting* at veita tøkkir at HARRANUM, og at syngja *lovprís*ing*ar* at tínum navni, O mest Høgi:
2 At sýna fram tína elskandi blídni um morgunin, og tína trúfesti hvørja nátt,
3 Uppá eitt ljóðføri av tíggju streingjum, og uppá psaltrin; uppá hørpuna við einum hátíðar ljóði.
4 Tí at tú, HARRI, hevurt gjørt meg glaðan gjøgnum títt verk: eg vil stórsigra í verkunum av tínum hondum.
5 O HARRI, hvør mikil eru verk tíni! *og* tínar hugsanir eru sera djúpar.
6 Ein óskynskur maður skynar ikki; eiheldur skilur ein dári hetta.
7 Tá ið teir vondu spretta sum grasið, og tá ið allir misgerðarvirkararnir blómka; *tá er tað fyri* at teir skulu verða oyddir um ævir:
8 Men tú, HARRI, *ert mest* høgur um ævirmeir.
9 Tí at sí, tínir figgindar, O HARRI, tí at sí, tínir figgindar skulu týnast; allir misgerðar-virkararnir skulu verða spjaddir.

10 Men horn mítt skalt tú upphevja líkasum *hornið hjá* einum ēinhyrningi: eg skal verða salvaður við frískari olju.
11 Míni eygu eisini skulu sjá *mína trá* á mínar figgindar, *og* míni oyru skulu hoyra *mína trá* um teir vondu, sum rísa upp ímóti mær.
12 Hin ræ̈ttvísi skal blómka sum pálmatræið: hann skal vaksa sum eitt sedris*træ* í Lī´-bă-nŏn.
13 Teir, ið veri plantaðir í húsi HARRANS, skulu blómka í forgørðum Guðs várs.
14 Teir skulu enn bera fram ávøkst í gomlum aldri; teir skulu vera feitir og blómkandi;
15 Til at sýna, at HARRIN *er* reiðiligur: *hann er* mín klettur, og *tað er* eingin órættvísi í honum.

PSÁLMUR 93

HARRIN ríkir, hann er klæddur við hátign; HARRIN er klæddur við styrki, *hvarvið* hann hevur gyrt seg: heimurin eisini er grundfestur, at hann kann ei verða vikaður.
2 Títt hásæti *er* grundfest úr forðum: tú *ert* frá ævigtvarandi.
3 Flóðirnar hava lyft upp, O HARRI, flóðirnar hava lyft upp sína rødd; flóðirnar lyfta upp sínar aldur.
4 HARRIN á hæddini *er* mektigari enn ljóðið av mongum vøtnum, *ja, enn* hinar mektigu aldur havsins.
5 Tínir vitnisburðir eru sera vissir: heilagleiki sømir tínum húsi, O HARRI, um ævir.

PSÁLMUR 94

O HARRI Guð, til hvørs tilhoyrir hevnd; O Guð, til hvørs tilhoyrir hevnd, sýn teg.
2 Lyft upp teg sjálvan, tú dómari jarðarinnar: rinda eitt endurgjald til hinna dramblátu.
3 HARRI, hvussu leingi skulu hinir vondu, hvussu leingi skulu hinir vondu fegnast í siguri?
4 *Hvør leingi* skulu teir mæla *og* tala hørð ting? *og* allir misgerðar-virkararnir reypa sær?
5 Teir bróta í stykkir títt fólk, O HARRI, og níva tín arvalut.
6 Teir vega einkjuna og hin fremmanda, og myrða hinar faðirleysu.
7 Tó siga teir, HARRIN skal ikki síggja, eiheldur skal Guð Jákobs geva gætur eftir *tí*.
8 Skiljið, tit óskynsku millum fólksins: og *tit* dárar, nær vilja tit verða vísir?
9 Hann, sum plantaði oyrað, skal hann ikki hoyra? hann, sum myndaði eygað, skal hann ikki síggja?
10 Hann, sum agar hinar heidnu, skal hann ikki rættleiða? hann, sum frálærir manni kunnskap, *skal hann ikki vita?*
11 HARRIN kennir hugsanirnar hjá manni, at tær *eru* fáfongd.
12 Vælsignaður *er* tann maður, hvønn tú agart, O HARRI, og lærirt hann úr tíni lóg;
13 At tú mást geva honum hvílu frá mótburðar-døgunum, inntil holan verði grivin til hinna vondu.
14 Tí at HARRIN vil ikki kasta av fólk sítt, eiheldur vil hann yvirgeva arv sín.
15 Men dómur skal venda aftur at rættvísi: og allir hinir reiðiligu í hjarta skulu fylgja honum.
16 Hvør vil rísa upp fyri meg ímóti illgerarunum? *ella* hvør vil standa upp fyri meg ímóti misgerðar-virkarunum?
17 Uttan HARRIN *hevði verið* mín hjálp, hevði mín sál næstan dvalst í tagnar*heimi*.
18 Tá ið eg segði, Fótur mín glíður; tín miskunn, O HARRI, helt mær uppi.
19 Í fjøldini av mínum hugsanum innan í mær, fragda tínar ugganir mína sál.

20 Skal misgerðar-hásætið hava samfelag við teg, sum myndar skaða við eini lóg?
21 Teir savna seg saman ímóti sál hins rættvísa, og fordøma hitt sakleysa blóð.
22 Men HARRIN er verja mín; og Guð mín *er* klettur skjóls míns.
23 Og hann skal føra uppá teir teirra egnu misgerð, og skal skera teir av í teirra egnu vondsku; *ja,* HARRIN vár Guð skal skera teir av.

PSÁLMUR 95

O KOMIÐ, latum okkum syngja at HARRANUM: latum okkum gera eitt frødligt ljóð til kletts frelsu várar.
2 Latum okkum koma framfyri hansara nærveru við takkarveitan, og gera honum eitt frøifult ljóð við psálmum.
3 Tí at HARRIN *er* ein mikil Guð, og ein mikil Kongur omanfyri allar gudar.
4 Í hans hond *eru* hini djúpu plóss jarðarinnar: heyggjanna styrki *er* hansara við.
5 Sjógvurin *er* hansara, og hann gjørdi hann: og hansara hendur myndaðu hitt turra *land.*
6 O komið, latum okkum tilbiðja og boyggja *okkum* niður: latum okkum knela frammi fyri HARRANUM skapara várum.
7 Tí at hann *er* Guð okkara; og vit *eru* fólkið av hansara beiti, og seyðurin av hans hond. Í dag, um tit vilji hoyra rødd hansara,
8 Herðið ikki hjarta tykkara, eins og í tirringini, *og* eins og *á* freistingardeginum í oyðuni:
9 Tá ið tykkara fedrar freistaðu meg, royndu meg, og sóu mítt verk.
10 Heili fjøruti ár var eg harmur við *hesa* ætt, og segði, Tað *er* eitt fólk sum fara skeivir í hjarta sínum, og hava ikki teir kent mínar vegir:
11 At hvørjum eg svór í vreiði míni, at teir skuldu ikki innfara inn í hvílu mína.

PSÁLMUR 96

O SYNGIÐ HARRANUM ein nýggjan song: syng HARRANUM, øll jørðin.
2 Syngið HARRANUM, vælsignið hans navn; sýnið fram hansara frelsu frá degi til dags.
3 Kunngerið hansara dýrd hinna heidnu millum, hans undur blant alt fólk.
4 Tí at HARRIN *er* stórur, og stórligani at verða prísaður: hann *eigur* at verða óttaður omanfyri allar gudar.
5 Tí at allir gudar tjóðanna *eru* skurðgudar: men HARRIN gjørdi himnarnar.
6 Heiður og hátign *eru* frammi fyri honum: styrki og vakurleiki *eru* í halgidómi hans.
7 Gevið HARRANUM, O tit ættir fólksins, gevið HARRANUM dýrd og styrki.
8 Gevið HARRANUM dýrdina, *skyldug* hansara navni: komið við einum ofri, og komið inn í hansara forgarðar.
9 O tilbiðjið HARRAN í vakurleika heilagleikans: óttast frammi fyri honum, øll jørðin.
10 Sigið hinna heidnu millum, *at* HARRIN ríkir: verøldin eisini skal verða grundfest, at hon skal ei verða vikað: hann skal døma fólkið rættvísiliga.
11 Lat himnarnar fegnast, og lat jørðina vera glaða; lat sjógvin ýla, og fylling hans.
12 Akurin veri frødligur, og alt sum *er* harí: tá skulu øll skógarins trø fegnast
13 Frammi fyri HARRANUM: tí at hann kemur, tí at hann kemur til *tess* at døma jørðina: hann skal døma heimin við rættvísi, og fólkið við sannleika sínum.

PSÁLMUR 97

HARRIN ríkir; lat jørðina fegnast; lat oyggjanna fjøld vera glaða *harum*.
2 Skýggj˙ og myrkur *eru* rundan um hann: rættvísi og dómur *eru* bústaður trónu hans.
3 Ein eldur gongur undan honum, og brennur upp hansara fíggindar runt umkring.
4 Hansara snarljós lýsnaðu heimin: jørðin sá, og nøtraði.
5 Heyggjarnir smeltaðu sum vaks fyri nærveru HARRANS, fyri nærveru Harra alrar jarðarinnar.
6 Himnarnir kunngera rættvísi hansara, og alt fólkið sær hansara dýrd.
7 Fimlaðir veri allir teir sum tæna ristum myndum, sum rósa sær av skurðgudum: tilbiðjið hann, allir *tit* gudar.
8 Zion hoyrdi, og varð glað; og Judah døtur fegnaðust orsakað av tínum dómum, O HARRI.
9 Tí at tú, HARRI, *ert* høgur omanfyri alla jørðina: tú ert upphevjaður langt omanfyri allar gudar.
10 Tit, sum elska HARRAN, hatið ilt: hann varðveitir sálirnar hjá sínum heilagu; hann bjargar teimum út úr hond teirra vondu.
11 Ljós verður sáað til hinna rættvísu, og gleði til hinna reiðiligu í hjarta.
12 Fegnist í HARRANUM, tit rættvísu; og veitið tøkkir við minnið um hans heilagleika.

PSÁLMUR 98

Ein Psálmur.

O SYNGIÐ HARRANUM ein nýggjan sang; tí at hann hevur gjørt undrunarsom ting: hans høgra hond, og hans heilagi armur, hevur skaffað honum sigurin.
2 HARRIN hevur gjørt kunna sína frelsu: sína rættvísi hevur hann opinlýsligani sýnt í eygsjónini á hinum heidnu.
3 Hann hevur minst sína miskunn og sannleika sín mótvegis húsi Ísraels: allir endar jarðarinnar hava sæð frelsu Guðs várs.
4 Ger HARRANUM eitt frødligt ljóð, øll jørðin: ger eitt hart ljóð, og fegnast, og syng lov.
5 Syngið HARRANUM við hørpuni; við hørpuni, og røddini av einum psálmi.
6 Við lúðrum og ljóði av kornett gerið eitt frødligt ljóð frammi fyri HARRANUM, Konginum.
7 Sjógvurin ýli, og fylling hans; verøldin, og teir sum búgva hari.
8 Flóðirnar klappi *sínar* hendur: heyggjarnir veri frødligir tilsaman
9 Frammi fyri HARRANUM; tí at hann kemur til *tess* at døma jørðina: við rættvísi skal hann døma heimin, og fólkið við rættferð.

PSÁLMUR 99

HARRIN ríkir; fólkið bivi: hann situr *imillum* chêr-ûbĭm´-arnar; verði jørðin riðað.
2 HARRIN *er* mikil í Zion; og hann *er* høgt omanfyri alt fólkið.
3 Lat teir prísa tínum mikla og øgiliga navni; *tí at* tað *er* heilagt.
4 Styrki kongsins eisini elskar dóm; tú grundfestirt rættferð, tú útinnirt dóm og rættvísi í Jákobi.
5 Upphevjið tit HARRAN Guð váran, og tilbiðjið við hansara fótskammul; *tí at* hann *er* heilagur.
6 Móses og Aaron hansara presta millum, og Sámuel millum teirra sum kalla uppá hans navn; teir kallaðu uppá HARRAN, og hann teimum svaraði.
7 Hann talaði við teir í hini skýggjutu súlu: teir hildu hansara vitnisburðir, og regluskipanina *sum* hann teimum gav.
8 Tú teim svaraðirt, O HARRI Guð vár: tú vart ein Guð sum

fyrigavst teimum, tó *at* tú tókst hevnd á teirra uppfinningar.
9 Upphevjið HARRAN Guð váran, og tilbiðjið við hans heilaga heyg; tí at HARRIN vár Guð *er* heilagur.

PSÁLMUR 100

Ein *lov*prís*ing*ar-Psálmur.

GERIÐ HARRANUM eitt frøddligt ljóð, øll tit lond.
2 Tænið HARRANUM við gleði: komið framfyri hansara nærveru við synging.
3 Vitið tit, at HARRIN, hann *er* Guð: *tað er* hann *sum* hevur gjørt okkum, og ikki vit sjálvir; *vit eru* fólk hans, og seyðurin av hansara beiti.
4 Farið inn í hans portur við takkarveitan, *og* inn í hans forgarðar við *lov*prísan: verið takksamir honum, *og* vælsignið hans navn.
5 Tí at HARRIN *er* góður; hans miskunn *er* ævigtvarandi; og hansara sannleiki *varir* til allar ættir.

PSÁLMUR 101

Ein Psálmur av Dávidi.

EG vil syngja um miskunn og dóm: at tær, O HARRI, vil eg syngja.
2 Eg vil hátta mær vísliga á ein fullkomnan veg. O nær vilt tú koma at mær? Eg vil ganga innan í mínum húsi við einum fullkomnum hjarta.
3 Eg vil ongan vondan lut seta frammi fyri eygum mínum: eg hati verk teirra sum venda til viks; *tað* skal ikki krøkjast til mín.
4 Eitt rangvørgt hjarta skal víkja frá mær: eg vil ikki kenna ein vondan *persón*.
5 Hvør*ið*so loyniliga baktalar sín næsta, hann vil eg skera av: hann, sum hevur eitt høgt eygnabrá og eitt hugmóðugt hjarta, vil ikki eg tola.
6 Míni eygu *skulu vera* uppá hinar trúføstu landsins, at teir mega dvøljast hjá mær: hann, sum gongur á ein fullkomnan veg, hann skal tæna mær.
7 Hann, sum virkar svik, skal ikki dvøljast innan í húsi mínum: hann, sum sigur lygnir, skal ikki dvølja í míni eygsjón.
8 Eg vil árla oyða allar hinar vondu landsins; at eg má skera av allar vondar gerningsmenn frá staði HARRANS.

PSÁLMUR 102

Ein Bøn hjá tí nívda, tá ið hann er undirdíktur, og hellir út sína klagu frammi fyri HARRANUM.

HOYR mína bøn, O HARRI, og lat mítt róp koma at tær.
2 Fjal ikki títt andlit frá mær á tí degi *tá ið* eg eri í trongd; bend títt oyra at mær: á tí degi, *tá ið* eg kalli, svara mær skundisliga.
3 Tí at mínir dagar verða upptærdir líkasum roykur, og míni bein verða brend sum ein grúgva.
4 Mítt hjarta er sligið, og følnar sum gras; so at eg gloymi at eta mítt breyð.
5 Orsakað av røddini av míni eymkan, krøkjast míni bein til mína húð.
6 Eg eri eins og ein pelikanur úr oyðuni: eg eri eins og ein ugla úr oyðimørkini.
7 Eg vaki, og eri sum ein spurvur aleinaur uppiá húsatoppinum.
8 Mínir figgindar spotta meg allan dagin; *og* teir, sum eru óðir ímóti mær, eru svornir ímóti mær.
9 Tí at eg havi etið øskur líkasum breyð, og blandað mín drykk við gráti,
10 Vegna tína harmavreiði og tína vreiði: tí at tú hevurt lyft meg upp, og kastað meg niður.
11 Mínir dagar *eru* eins og ein skuggi sum minkar; og eg eri følnaður líkasum gras.
12 Men tú, O HARRI, skalt vara um ævir; og tín endurminning at øllum ættum.

13 Tú skalt reisast, *og* hava miskunn yvir Zion: tí at tíðin til at góðvilda hana, ja, hin setta tíðin, er komin.
14 Tí at tænarar tínir hava fragd í steinum hennara, og ynda dustið harav.
15 So skulu hinir heidnu óttast navn HARRANS, og allir kongar jarðarinnar tína dýrd.
16 Tá ið HARRIN skal byggja upp Zion, skal hann birtast í síni dýrd.
17 Hann vil geva gætur eftir bønini hjá hinum neyðstadda, og ikki vanvirða teirra bøn.
18 Hetta skal verða skrivað til ættina sum koma skal: og fólkið, sum skal verða skapað, skal prísa HARRANUM.
19 Tí at hann hevur hugt niður frá hæddini av sínum halgidómi; frá himni skoðaði HARRIN jørðina;
20 At hoyra fangans eymkan; at loysa teir sum eru útnevndir til deyða;
21 At kunngera navn HARRANS í Zion, og hansara lov í Jerusalem;
22 Tá ið fólkini eru savnaði saman, og kongadømini, at tæna HARRANUM.
23 Hann veikti *um* mína styrki á veginum; hann stytti *um* mínar dagar.
24 Eg segði, O Guð mín, tak meg ikki burtur í miðjum døgum mínum: tíni ár *eru* út gjøgnum allar ættir.
25 Úr fordum hevurt tú lagt grundvøllir jarðarinnar: og himnarnir *eru* verk handa tína.
26 Teir skulu farast, men tú skalt vara við: ja, allir av teimum skulu vaksa gamlir líkasum eitt klæði; sum ein kappa skalt tú skifta teir, og teir skulu verða skiftir:
27 Men tú *ert* hin sami, og tíni ár skulu ongan enda fá.
28 Børn tænara tína skulu halda áfram, og teirra sáð skal verða grundfest frammi fyri tær.

PSÁLMUR 103

Ein Psálmur av Dávidi.

VÆLSIGNA HARRAN, O mín sál: og alt sum er innan í mær, *vælsigna* hans heilaga navn.
2 Vælsigna HARRAN, O mín sál, og gloym ikki allar hans vælgerðir:
3 Sump fyrigevur allar misgerðir tínar; sump grøðir allar sóttir tínar;
4 Sump endurloysir títt lív frá oyðing; sump krýnir teg við elskandi blídni og eymum miskunnum;
5 Sump mettar tín munn við góðum *tingum; so at* tín ungdómur verður endurnýggjaður líka *sum* hjá ørnini.
6 HARRIN útinnir rættvísi og dóm fyri allar sum eru kúgaðir.
7 Hann gjørdi kunnar sínar vegir at Mósesi, sínar gerningar at Ísraels børnum.
8 HARRIN *er* miskunnarfullur og náðisamur, seinur til firtnis, og ríkiligsamur í miskunn.
9 Hann vil ikki altíð deila: eiheldur vil hann halda *síni firtni* um ævir.
10 Hann hevur ikki farið við okkum eftir okkara syndum; ella endurgoldið okkum samsvarandi við okkara misgerðir.
11 Tí at eins og himinin er høgt uppiyvir jørðini, *so* mikil er hansara miskunn mótvegis teimum ið óttast hann.
12 So fjart sum eystrið er frá vestrinum, *so* fjart hevur hann firrað okkara misbrot frá okkum.
13 Líka sum ein faðir várkunnar *sínum* børnum, *soleiðis* HARRIN várkunnar teimum sum óttast hann.
14 Tí at hann kennir okkara skap; hann minnist til, at vit *eru* dust.
15 *Hvat* manni *viðvíkur,* hansara dagar *eru* sum gras: sum ein akursins blóma, soleiðis blómar hann.

16 Tí at vindurin fer yvir hana, og hon er farin; og plássið harav skal hana kenna ei meira.
17 Men HARRANS miskunn *er* frá ævigtvarandi til ævigtvarandi yvir teir sum óttast hann, og hansara rættvísi at barnabørnum;
18 Til slíkra sum halda hansara sáttmála, og til teirra sum minnast hansara boð˘ at gera tey.
19 HARRIN hevur fyribúgvið sítt hásæti í himnunum; og hans kongadømi ríkir yvir øllum.
20 Vælsignið HARRAN, tit hans einglar, sum skara framúr í styrki, sum gera hansara boð˘, lýðandi á røddina av hans orði.
21 Vælsignið tit HARRAN, øll *tit* herlið hans; *tit* tænarar hjá honum, sum fremja hansara fragd.
22 Vælsignið HARRAN, øll hans verk í øllum plássum av hans harradømi: vælsigna HARRAN, O mín sál.

PSÁLMUR 104

VÆLSIGNA HARRAN, O mín sál. O HARRI Guð mín, tú ert sera mikil; tú ert klæddur við æru og hátign.
2 Sum dekkart *teg* við ljósi sum *við* einum klæði: sum tenurt út himnarnar sum ein tjalddúk:
3 Sum^{p} leggur bjálkarnar av sínum kømrum í vøtnini: sum^{p} ger skýggini *til* hervagn sín: sum^{p} gongur uppiá veingjum vindsins:
4 Sum^{p} ger sínar einglar *til* andar; sínar tænarar *til* ein logandi eld:
5 *Sum^{p}* legði grundvøllir jarðarinnar, *at* hon skuldi ei verða vikað um ævir.
6 Tú dekkaðirt hana við djúpinum sum *við* einum klæði: vøtnini stóðu uppiyvir fjøllunum.
7 Við tína hartan tey flýddu; við røddina av tíni toru tey skundaðu avstað.
8 Tey fara upp eftir fjøllunum; tey fara oman eftir dølunum, at plássinum sum tú hevurt grundlagt til teirra.
9 Tú hevurt sett eitt mark, sum tey mega ikki fara yvirum; at tey vendi ikki aftur at dekka jørðina.
10 Hann sendir lindirnar inn í dalarnar, *sum* renna heyggjanna millum.
11 Tær geva drekka til hvørt djór markarinnar: hinir villini asnar sløkkja sín torsta.
12 Við˘ teimum skulu himinsins fuglar hava sín bústað, *sum* syngja greinanna millum.
13 Hann heyggjarnar vatnar frá sínum kømrum: jørðin verður mettað við ávøkstinum av tínum verkum.
14 Hann veldur grasinum at vaksa til fenaðin, og urt til tænastuna hjá manni: at hann má føra fram mat úr jørðini;
15 Og vín, *sum* ger glatt mans*ins* hjarta; *og* olju at fáa *hans* andlit at skína; og breyð, *sum* styrkir mans*ins* hjarta.
16 HARRANS trø eru full *av saft;* Lí˙-bă-nŏn-s sedris*trø,* sum hann hevur plantað;
17 Hvar fuglarnir gera síni reiður: *hvat* storkinum *viðvíkur,* furutrøini *eru* hús hansara.
18 Hinir høgu heyggjar *eru* eitt skjól hjá hinum villini geitum; *og* klettarnir hjá kaninunum.
19 Hann skipaði mánan til árstíðir: sólin kennir sína niðurferð.
20 Tú gert myrkur, og tað er nátt: í hvørji øll skógarins djór skríða *fram*.
21 Tær ungu leyvurnar ýla eftir fongi sínum, og søkja sín mat frá Guði.
22 Sólin reisist, tær savna seg saman, og leggja seg niður í hellum sínum.
23 Maður fer út at síni vinnu og til sítt strev inntil kvøldið.

24 O HARRI, hvør margføld eru tíni verk! í vísdómi hevurt tú gjørt tey øll: jørðin er full av tínum ríkdómum.
25 *Soleiðis er eisini* hesin mikli og víði sjógvur, í hvørjum *eru* skriðkykt óteljilig, bæði lítil og stór djór.
26 Har fara skipini: *har er* hasin lē´-vī-ă-thăn, *hvønn* tú hevurt gjørt til at spæla harí.
27 Hesi bíða øll eftir tær; at tú mást geva *teim* teirra mat í rættari tíð.
28 *Tað,* tú gevurt teim, savna tey: tú leturt upp tína hond, tey verða fylt við góðum.
29 Tú krógvart títt andlit, tey órógvast: tú tekurt burt teirra andadrátt, tey doyggja, og venda aftur til sítt dust.
30 Tú sendirt fram tín anda, tey verða skapað: og tú endurnýggjart ásjón jarðarinnar.
31 HARRANS dýrd skal vara um ævir: HARRIN skal fegnast í verkum sínum.
32 Hann hyggur á jørðina, og hon nøtrar: hann nertur við heyggjarnar, og teir rúka.
33 Eg vil HARRANUM syngja so leingi sum eg livi: eg vil syngja prís til mín Guð, meðan eg havi mína veran.
34 Mín grundan um hann skal vera søt: eg vil vera glaður í HARRANUM.
35 Lat syndararnar verða upptærdar burtur av jørðini, og lat hinar vondu vera ei meira. Vælsigna tú HARRAN, O mín sál. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 105

O GEVIÐ HARRANUM tøkkir, kallið uppá hans navn: gerið kunnar hans gerningar millum fólksins.
2 Syngið honum, syngið honum psálmar: talið tit um øll hans undursomu verk.
3 Dýrdist tit í hans heilaga navni: lat teirra hjarta fegnast sum søkja HARRAN.
4 Søkið HARRAN, og hansara styrki: søkið hans andlit med alla.
5 Minnist hans undranarsomu verk, sum hann hevur gjørt; hans undur˘ og dómarnar av hansara munni;
6 O tit sáð Ábrahams, tænara hans; tit børn hjá Jákobi, útvalda hans.
7 Hann *er* HARRIN vár Guð: hans dómar á allari jørðini *eru*.
8 Hann hevur minst til sín sáttmála um ævir, orðið *sum* hann ábeyð til túsund ættir.
9 Hvønn *sáttmála* hann gjørdi við Ábraham, og sín eið innat Ísaaki;
10 Og staðfesti hin sama at Jákobi til eina lóg, *og* fyri Ísrael *til* ein ævigtvarandi sáttmála:
11 Sigandi, Innat tær vil eg geva land Cānaans, lut arvs tykkara:
12 Tá ið teir vóru *bert* nakrir fáir menn í tali; ja, sera fáir, og fremmandir í tí.
13 Tá ið teir fóru frá ēinari tjóð til aðra, frá *ēinum* kongadømi til eitt annað fólk;
14 Hann loyvdi ongum manni at gera teim órætt: ja, hann írættasetti kongar fyri teirra sakir;
15 *Sigandi,* Nertið ikki salvaða mín, og gerið prophetum mínum einkið mein.
16 Harafturat rópaði hann eina hungursneyð uppá landið: hann breyt allan stavin av breyði.
17 Hann sendi ein mann undan teimum, *enntá* Jóseph, *sum* varð seldur sum trælur:
18 Hvørs føtur teir skaddu við fjøtrum: hann varð lagdur í jarn:
19 Inntil tíðina sum orð hansara kom: royndi HARRANS orð hann.
20 Kongurin sendi og loysti hann; *enntá* stjórnari fólksins, og læt hann fara frían.

21 Hann gjørdi hann *til* harra av sínum húsi, og stjórnara av øllum sínum *figgjar*evni:
22 At binda sínar prinsar eftir síni vild; og læra sínar tingmenn vísdóm.
23 Ísrael eisini kom inn í Egyptaland; og Jákob útisat í Hams landi.
24 Og hann økti um sítt fólk stórliga; og gjørdi teir sterkari enn teirra figgindar.
25 Hann vendi teirra hjarta at hata sítt fólk, at fara sniðfundigani við sínum tænarum.
26 Hann sendi Móses sín tænara; *og* Aaron, hvønn hann hevði valt.
27 Teir sýndu hansara tekinˇ teirra millum, og undurˇ í landi Hams.
28 Hann sendi myrkur, og gjørdi tað myrkt; og teir gjørdu ikki uppreist ímóti hans orði.
29 Hann vendi teirra vøtn yvirí blóð, og vó teirra fisk.
30 Teirra land bar fram froskar í yvirflóð, í kømrunum hjá teirra kongum.
31 Hann talaði, og tað komu ymis sløg av flugum, *og* lýs í øllum teirra breddum.
32 Hann gav teimum hegling fyri regn, *og* logandi eld í teirra landi.
33 Hann sló teirra víntrø eisini og teirra fikutrø; og breyt trøini hjá teirra breddum.
34 Hann talaði, og grashoppurnar komu, og jarðvargar, og tað uttan tal,
35 Og ótu upp allar urtirnar í teirra landi, og gloyptu upp ávøkstin hjá teirra lendi.
36 Hann sló eisini allar hinar frumbornu í teirra landi, hinar fremstu av allari teirra styrki.
37 Hann førdi teir fram eisini við silvuri og gulli: og *tað var* ikki ēin ússaligur *persónur* millum ættargreina teirra.
38 Egyptaland var fegið tá ið teir fóru avstað: tí at óttin fyri teimum fell uppá teir.
39 Hann breiddi eitt skýggj til eina dekking; og eld at geva ljós um náttina.
40 *Fólkið* umbað, og hann førdi lynghøsnˇ, og teir mettaði við breyði himins.
41 Hann opnaði klettin, og vøtnini gustu út; tey runnu í teimum turru plássunum *sum* ein á.
42 Tí hann mintist sína heilagu fyrijáttan, *og* Ábraham sín tænara.
43 Og hann førdi fram sítt fólk við frøi, *og* sín útvalda við gleði:
44 Og gav teimum lond teirra heidnu: og teir arvaðu fólksins strev;
45 At teir máttu geva far um hans ásetingar, og halda hansara lógir. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 106

PRÍSIÐ tit HARRANUM. O gevið HARRANUM tøkkir; tí at góður *hann er:* tí hansara miskunn *varir* um ævir.
2 Hvør kann mæla HARRANS mektigu gerningar? *hvør* kann sýna fram alt hansara prís?
3 Vælsignaðir *eru* teir sum varða *um* dóm, *og* hann sum innir rættvísi til allar tíðir.
4 Minst til mín, O HARRI, við góðtokkanum *sum tú bert* tínum fólki: O vitja meg við tíni frelsu;
5 At eg má síggja tað góða hjá tínum útvalda, at eg má fegnast í gleðini hjá tíni tjóð, at eg má dýrda við tínum arvi.
6 Vit hava syndað við okkara fedrum, vit hava framt misgerð, vit hava gjørt vondliga.
7 Okkara fedrar skiltu ei tíni undur í Egyptalandi; teir mintust ikki til fjøldina av tínum miskunnum; men tirraðu *hann* við havið, *enntá* við Reyða-havið.

8 Hóast hetta, hann frelsti teir
fyri navns síns skuld, at hann
mátti fáa sín mektiga mátt at
verða kunnan.
9 Hann hartaði Reyða-havið
eisini, og tað varð turkað upp: so
hann leiddi teir ígjøgnum dýpdir-
nar, sum ígjøgnum oyðuna.
10 Og hann frelsti teir frá hond
hans ið hataði *teir,* og endurloysti
teir frá figgindans hond.
11 Og vøtnini dekkaðu teirra
figgindar: tað var ikki ein av teim-
um eftir.
12 Tá trúðu teir hansara orð-
um; teir sungu hansara prís.
13 Teir skjótt gloymdu hansara
verk˘; teir bíðaðu ei eftir hansara
tilráðing:
14 Men girnaðust ovurhonds-
ligani í oyðuni, og freistaðu Guð
í oyðimørkini.
15 Og hann gav teimum teirra
fyrispurning; men sendi soltni
inn í teirra sál.
16 Teir øvundaðu Móses eisini
í leirinum, *og* Aaron – HARRANS
heilaga.
17 Jørðin opnaði og svølgdi
upp Dá´-thăn, og huldi Á´-bĭ-răm-s
flokk.
18 Og ein eldur varð kyndur í
teirra flokki; eldurin brendi upp
hinar vondu.
19 Teir gjørdu ein kálv í Hór´-
ĕb, og tilbóðu ta bræddu mynd.
20 Svá skiftu teir sína dýrd
yvirí líksemina av einum oksa
sum etur gras.
21 Teir gloymdu Guð sín frels-
ara, hvør gjørt hevði mikil ting í
Egyptalandi;
22 Undursom verk í Hams
landi, *og* øgilig ting við Reyða-
havið.
23 Tí segði hann, at hann vildi
oyða teir; hevði ikki Móses, hans
útvaldi, staðið frammi fyri hon-
um í skarðinum, at venda burt
hansara vreiði, at ikki hann skuldi
oyða *teir.*
24 Ja, teir vanvirdu hitt dámliga
land, teir trúðu ikki hans orði:
25 Men meylaðu í sínum tjøld-
um, *og* lýddu ikki á rødd HARR-
ANS.
26 Tí lyfti hann upp sína hond
ímóti teimum, at kollrenna teir í
oyðuni:
27 At kollrenna teirra sáð eisini
millum tjóðirnar, og at spjaða teir
í londunum.
28 Teir sameintu seg eisini at
Bā´-ăl-pĕ´-ôr-i, og ótu sláturoffur˘
hinna deyðu.
29 Svá tirraðu teir *hann* til
firtnis við sínum páfundum: og
plágan breyt inn uppá teir.
30 Tá stóð upp Phĭ´-nĕ-hăs, og
útinti dóm: og *svá* varð plágan
steðgað.
31 Og tað varð roknað honum
til rættvísis at øllum ættum um
ævirmeir.
32 Teir østu *hann* eisini við
klandurs-vøtnini, so at tað gekk
illa hjá Mósesi fyri teirra sakir:
33 Av tí at teir tirraðu hans
anda, so at hann talaði óumráði-
ligani við sínum varrum.
34 Teir oyddu ikki tjóðirnar,
viðvíkjandi hvørjum HARRIN teim
beyð:
35 Men vórðu blandaðir hinna
heidnu millum, og lærdu teirra
verk˘.
36 Og teir tæntu teirra skurð-
gudum: sum vórðu ein snerra at
teim.
37 Ja, teir sláturofraðu sínar
synir og sínar døtur at djevlum,
38 Og heltu *út* sakleyst blóð,
enntá blóðið av sonum sínum
og døtrum sínum, hvørji teir
sláturofraðu skurðgudum Cān-
aans: og landið varð óreinkað við
blóði.
39 Svá vórðu teir dálkaðir við
egnu verkum sínum, og fóru hor-
andi við egnu páfundum sínum.
40 Tessvegna varð HARRANS
vreiði kynd ímóti hansara fólki;

so mikið, at hann stiknaðist við sín egna arv.
41 Og hann gav teir inn í hond hinna heidnu; og teir, sum hataðu teir, stjórnaðu yvir teimum.
42 Teirra figgindar eisini kúgaðu teir, og teir vórðu førdir inn í undirgivni undir teirra hond.
43 Mangar ferðir hann útfríaði teir; men teir tirraðu *hann* við sínum ráði, og vórðu førdir lágt fyri sína misgerð.
44 Hóast hetta, hann gav gætur um teirra nívd, tá ið hann hoyrdi teirra róp:
45 Og hann mintist teirra vegna sín sáttmála, og iðraðist samsvarandi við fjøldina av sínum miskunnum.
46 Hann fekk teir eisini at verða várkunnaðar av øllum teimum sum bóru teir *til* fangar.
47 Frels okkum, O HARRI Guð vár, og savna okkum hinna heidnu millum ífrá, at veita tøkkir at heilaga navni tínum, *og* at stórsigra í tínum lovi.
48 Vælsignaður *veri* HARRIN Guð Ísraels frá ævigtvarandi til ævigtvarandi: og lat alt fólkið siga, Á-měn. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 107

O GEVIÐ HARRANUM tøkkir, tí at góður *hann er:* tí hansara miskunn *varir* um ævir.
2 Lat hinar endurloystu HARRANS siga *tað,* sumᵖ hann hevur endurloyst frá figgindans hond;
3 Og savnað teir úr londunum, úr eystri, og úr vestri, úr norðri, og úr suðri.
4 Teir reikaðu í oyðuni á ein ēinligan veg; teir funnu ongan stað til at búgva í.
5 Svangir og tyrstir, ørmaktaðist teirra sál í teimum.
6 Tá rópaðu teir á HARRAN í síni trongd, *og* hann útfríaði teir úr teirra neyðum.
7 Og hann leiddi teir fram eftir hinum rætta vegi, at teir máttu fara til ein íbúgvingar-stað.
8 Á, at *menn* vildu HARRANUM prísað *fyri* hansara góðsku, og *fyri* hans undurfullu verk móti mannabørnunum!
9 Tí hann mettar sálina, hvørji leingist, og fyllir hina svongu sál við góðsku.
10 Slíkir sum sita í myrkri og í skugga deyðans, *verandi* bundnir í nívd og jarni;
11 Av tí at teir gjørdu uppreist ímóti Guðs orðum, og vanvirdu ráð hins mest Høga:
12 Hann tessvegna førdi niður teirra hjarta við strevi; teir fullu niður, og *tað var* eingin at hjálpa.
13 Tá rópaðu teir á HARRAN í síni trongd, *og* hann frelsti teir úr teirra neyðum.
14 Hann førdi teir út úr myrkri og skugga deyðans, og breyt teirra bond sundur.
15 Á, at *menn* vildu HARRANUM prísað *fyri* hansara góðsku, og *fyri* hans undurfullu verk móti mannabørnunum!
16 Tí at hann hevur brotið portrini av messing, og skorið lokurnar av jarni sundur.
17 Dárar, uppá grund av sínum misbroti, og uppá grund av sínum misgerðum, eru nívdir.
18 Teirra sál stendst við alskyns mat; og teir nærkast at deyðans portrum.
19 Tá rópa teir á HARRAN í síni trongd, *og* hann frelsir teir úr teirra neyðum.
20 Hann sendi sítt orð, og teir grøddi, og *teim* bjargaði frá teirra oyðingum.
21 Á, at *menn* vildu HARRANUM prísað *fyri* hansara góðsku, og *fyri* hans undurfullu verk móti mannabørnunum!
22 Og lat teir sláturofra sláturofrini av takkarveitan, og kunngera hans verkˇ við fagnan.
23 Teir sum fara oman til hav-

ið í skipum, sum í miklum vøtnum gera gerning;
24 Hesir síggja verkini hjá HARRANUM, og hans undur í djúpinum.
25 Tí hann býður, og reisir hin stormuta vind, sum lyftir upp aldur hans.
26 Teir hevja *seg* upp til himinin, teir fara niður aftur til djúpið: teirra sál er bráðnað uppá grund av trongd.
27 Teir stetla til og frá, og vingla sum ein drukkin maður, og vita ikki síni *livandi* ráð.
28 Tá geyla teir á HARRAN í síni trongd, og hann førir teir úr teirra neyðum.
29 Hann ger stormin eitt stilli, so at hans aldur eru stillar.
30 Tá eru teir glaðir, av tí at tær verði kyrrar; so hann førir teir at teirra tráaðu havn.
31 Á, at *menn* vildu HARRANUM prísað *fyri* hansara góðsku, og *fyri* hans undurfullu verk móti mannabørnunum!
32 Lat teir upphevja hann eisini í samkomu fólksins, og honum prísa í savnaði hinna elstu.
33 Hann skiftir áum yvirí oyðu, og vatnskeldunum yvirí turrlendi;
34 Einum fruktbærum landi yvirí ófruktbærni; fyri vondskuna hjá teimum ið búgva harí.
35 Hann skiftir oyðuna yvirí eitt standandi vatn, og turrlendi yvirí vatnslindir.
36 Og har fær hann teir svongu at búgva, at teir mega fyribúgva ein stað til búsitingar;
37 Og sáa akrarnar, og planta víngarðar, sum mega geva *av sær* ávøkstir av grøði.
38 Hann vælsignar teir eisini, so at teir verða stórligani margfaldaðir; og loyvir ei teirra fenaði at minka.
39 Aftur verða teir fækkaðir og førdir lágt gjøgnum kúgan, kvølj an, og sorg.
40 Hann hellir vanvirðing omanyvir prinsar, og veldur teimum at reika í oyðuni, *har* eingin vegur *er*.
41 Tó setur hann hin fátæka til hæddar frá kvøljan, og ger *hann til* familjur sum eitt fylgi.
42 Hinir rættvísu skulu *tað* sjá, og fegnast: og øll misgerð skal tippa sín munn.
43 Hvør*iðenn* vísur *er,* og vil gáa eftir hesum *tingum,* enntá teir skulu skilja hina elskandi blídni HARRANS.

PSÁLMUR 108

Ein Songur *ella* Psálmur av Dávidi.

O GUÐ, mítt hjarta er fest; eg vil syngja og veita *lovprís*an, enntá við míni dýrd.
2 Vakna, psaltur og harpa: eg *sjálvur* vil vakna árla.
3 Eg vil prísa tær, O HARRI, millum fólksins: og eg vil syngja tær prísingar tjóðanna millum.
4 Tí at tín miskunn *er* mikil uppum himnarnar: og tín sannleiki *røkkur* at skýggjunum.
5 Vert tú upphevjaður, O Guð, uppum himnarnar: og tín dýrd uppum alla jørðina;
6 At tín háttelskaði má verða útfríaður: frels *við* tíni høgru hond, og svara mær.
7 Guð hevur talað í sínum heilagleika; eg vil fegnast, eg vil skifta *sundur* Sjḗ-chēm, og máta út Sūć-cōth-s dal.
8 Gilead *er* mítt; Mă-năś-sēh *er* mítt; Ḗ-phră-ím eisini *er* styrki høvurs míns; Judah *er* mín lóggevari;
9 Móab *er* tváttarskál mín; yvir Ḗ-dóm vil eg kasta út skógv mín; yvir Philistiu vil eg fegnast í siguri.
10 Hvør vil føra meg inn í hin sterka stað? hvør vil leiða meg inn í Ḗ-dóm?
11 *Vilt* ikki *tú,* O Guð, *sum* hevurt kastað okkum av? og vilt

ikki tú, O Guð, fara fram við okkara herliðum?

12 Veit okkum hjálp frá trongd: tí at fáfongd *er* hjálpin hjá manni.

13 Gjøgnum Guð, vit skulum inna reystliga: tí at hann *tað er, sum* skal traðka niður okkara fíggindar.

PSÁLMUR 109

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

HALT ikki friði tínum, O Guð *lov*prísanar mínar;

2 Tí at munnurin hjá tí vonda og munnurin hjá tí svikfulla eru opnaðir ímóti mær: teir hava talað ímóti mær við eini lúgvandi tungu.

3 Teir umringaðu meg umkring eisini við orðum av hatri; og bardust ímóti mær uttan grund.

4 Fyri mín kærleika teir eru mínir fíggindar: men eg *gevi meg sjálvan til* bønar.

5 Og teir hava endurgoldið mær ilt fyri gott, og hatur fyri kærleika mín.

6 Set tú ein vondan mann yvir hann: og lat Satan standa við hans høgru hond.

7 Tá ið hann skal verða dømdur, lat hann vera fordømdan: og lat hansara bøn gerast synd.

8 Lat hansara dagar verða fáar; *og* lat ein annan taka embæti hans.

9 Lat hansara børn verða faðirleys, og hans kona ein einkja.

10 Lat hansara børn støðugt verða flakkarar, og bidda: lat tey søkja eftir *sínum breyði* eisini úr sínum oyðistøðum.

11 Lat peninganoyðaran fanga alt sum hann hevur; og lat hinar fremmandu ræna hansara strev.

12 Lat ongan vera til at framleingja miskunn at honum: eiheldur lat nakran vera til at hava tokka í hansara faðirleysu børnum.

13 Lat hansara eftirslekt verða skorna av; *og* í tí fylgjandi ættarliðinum lat teirra navn vera slettað út.

14 Lat misgerðina hjá hansara fedrum verða minta til hjá HARRANUM; og lat ikki syndina hjá hansara móður verða slettaða út.

15 Lat tær verða frammi fyri HARRANUM støðugt, at hann má skera av minnið um tey frá jørðini.

16 Av tí at hann mintist ikki til at sýna miskunn, men søkti at hinum arma og tørvsama manni, at hann mátti enntá bana tí brotna í hjarta.

17 Eins og hann elskaði bannning, soleiðis lat hana koma at honum: eins og hann fragdaðist ikki í signing, soleiðis lat hana vera fjart frá honum.

18 Eins og hann klæddi seg sjálvan við banning líka sum við sínum klæði, soleiðis lat hana koma inn í hans innvølir líka *sum* vatn, og líka *sum* olju inn í hans bein.

19 Lat hana vera honum sum klæðið *sum* hylur hann; og fyri ein gyrðil, hvarvið hann støðugt er gyrdur.

20 *Lat* hetta *vera* endurgjaldið hjá mínum mótstandarum frá HARRANUM, og hjá teimum sum tala ilt ímóti míni sál.

21 Men ger tú fyri meg, O GUÐ Harrin, fyri navns tíns skuld: av tí at tín miskunn *er* góð, útfría tú meg.

22 Tí at eg *eri* armur og tørvandi, og mítt hjarta er sært innan í mær.

23 Eg eri farin eins og skuggin, tá ið hann minkar: eg verði syftur upp og niður sum grashoppan.

24 Míni knø eru veik gjøgnum føstu; og mítt kjøt bilar til fitis.

25 Eg gjørdist eisini eitt spott at teimum: *tá ið* teir hugdu uppá meg, ristu teir síni høvur.

26 Hjálp mær, O HARRI Guð mín: O frels meg samsvarandi við tína miskunn:
27 At teir mega vita, at hetta *er* hond tín; *at* tú, HARRI, hevurt gjørt tað.
28 Lat teir banna, men vælsigna tú: tá ið teir reisast, lat teir skammast; men lat tænara tín fegnast.
29 Lat mínar mótstandarar verða klæddar við skomm, og lat teir dekka seg sjálvar við síni egnu ørkymlan, sum við einum kappa.
30 Eg vil HARRANUM stórliga prísa við mínum munni; ja, eg vil prísa honum millum mannfjøldina.
31 Tí at hann skal standa við høgru hond hins arma, at frelsa *hann* frá teimum sum fordøma hansara sál.

PSÁLMUR 110

Ein Psálmur av Dávidi.

HARRIN segði við Harra mín, Sit tú við høgru hond mína, inntil eg geri tínar fíggindar *til* fótskammul tín.
2 HARRIN skal senda stavin av tíni styrki út úr Zion: stjórna tú í miðjum fíggindum tínum.
3 Títt fólk *skal vera* viljugt á degi veldis tíns, í vakurleikunum av heilagleika frá móðurlívi morgunsins: tú hevurt døgg ungdóms tíns.
4 HARRIN hevur svorið, og vil ikki iðrast, Tú *ert* ein prestur um ævir eftir skipan Měl-ch*ī*´-zê-děk-s.
5 Harrin við tína høgru hond skal lemja ígjøgnum kongar á degi vreiði sínar.
6 Hann skal døma hinna heidnu millum, hann skal fylla *plássini* við hinum deyðu kroppum; hann skal særa høvdini yvir mongum londum.
7 Hann skal drekka úr áarløkinum á vegnum: tí skal hann lyfta upp høvdið.

PSÁLMUR 111

PRÍSIÐ tit HARRANUM. Eg vil HARRANUM prísa við heila *mínum* hjarta, í savnaðinum hjá teimum reiðiligu, og *í* samkomuni.
2 HARRANS verk *eru* mikil, grundaði út av øllum teimum ið hava fragd harí.
3 Hansara verk *er* heiðursamt og dýrdsamt: og hans rættvísi varir um ævir.
4 Hann hevur gjørt síni undurfullu verk at verða mint til: HARRIN *er* náðisamur og fullur av várkunn.
5 Hann hevur givið mat at teimum ið óttast hann: hann vil ævir vera minnugur um sín sáttmála.
6 Hann hevur sýnt sínum fólki kraftina av sínum verkum, at hann má geva teimum arvalut teirra heidnu.
7 Verkini av hansara hondum *eru* sannleiki og dómur; øll hansara boð *eru* viss.
8 Tey standa føst um ævir og ævir, *og eru* gjørd í sannleika og reiðiligleika.
9 Hann sendi endurloysing at sínum fólki: hann hevur áboðið sín sáttmála um ævir: heilagt og virðingaróttasamt *er* hans navn.
10 HARRANS ótti *er* byrjan vísdóms: ein góðan skilning hava allir teir sum gera *boðini hjá honum:* hansara lov varir um ævir.

PSÁLMUR 112

PRÍSIÐ tit HARRANUM. Vælsignaður *er* tann maður *sum* óttast HARRAN, *sum* stórliga fragdast í hansara boðum.
2 Hansara sáð skal vera mektugt uppiá jørð: ætt teirra reiðiligu skal vera vælsignað.
3 Fæ og ríkidømir *skulu vera* í hans húsi: og hansara rættvísi varir um ævir.
4 Teimum reiðiligu reisist ljós í myrkrinum: *hann er* náðisamur, og fullur av várkunn, og rættvísur.

5 Ein góður maður sýnir góðvild, og lænir: hann vil leiða síni viðurskiftir við hygni.
6 Vissuliga, hann skal ei verða vikaður um ævir: hin rættvísi skal vera í ævigtvarandi minni.
7 Hann skal ei vera ræddur fyri illum tíðindum: hans hjarta er fast, troystandi á HARRAN.
8 Hans hjarta *er* grundfest, hann skal ei vera ræddur, inntil hann sjái *sína trá* uppá sínar fíggindar.
9 Hann hevur spreitt, hann hevur givið til hinna fátæku; hansara rættvísi varir um ævir; hans horn skal verða upphevjað við heiðuri.
10 Hin vondi skal sjá *tað,* og verða harmur; hann skal grísla við sínum tonnum, og bráðna burt: trá teirra vondu skal týnast.

PSÁLMUR 113

PRÍSIÐ tit HARRANUM. Prísið, O tit tænarar hjá HARRANUM, prísið navni HARRANS.
2 Vælsignað veri navn HARRANS frá hesi tíð fram og um ævirmeir.
3 Frá sólarrisinum at niðurfaringini av hini somu, *eigur* HARRANS navn at verða prísað.
4 HARRIN *er* høgt uppiyvir øllum tjóðum, *og* hansara dýrd uppiyvir himnunum.
5 Hvør *er* líkur HARRANUM Guði várum, sum á hædd*ini* býr,
6 Sum *seg* eyðmýkir at skoða *tey tingini sum eru* í himni, og á jørðini!
7 Hann reisir upp hin arma burtur úr støvinum, *og* lyftir hin tørvsama burtur úr tøðrúgvuni;
8 At hann má seta *hann* hjá prinsum, *enntá* hjá prinsum fólks síns.
9 Hann fær hina óburnu kvinnu at halda hús, *og at vera* eina frødliga móðir at børnum. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 114

TÁ ið Ísrael fór út úr Egyptalandi, Jákobs hús frá einum fólki av fremmandum máli;
2 Var Judah halgidómur hans, *og* Ísrael harradømi hans.
3 Sjógvurin sá *tað,* og flýddi: Jordan varð rikin tilbakar.
4 Fjøllini lupu líkasum veðrar, *og* teir lítlu heyggjarnir líkasum lomb.
5 Hvat *bagaði* tær, O tú sjógvur, at tú flýddirt? tú Jordan, *at* tú varðst rikin tilbakar?
6 Tykkum fjøllum, *at* tit lupu líkasum veðrar; *og* tit lítlu heyggjar, líkasum lomb?
7 Nøtra, tú jørð, fyri nærveru Harrans, fyri nærveru Guðs Jákobs;
8 Sum klettinum vendi *í* eitt standandi vatn, tinnuni í eina keldu av vøtnum.

PSÁLMUR 115

IKKI okkum, O HARRI, ikki okkum, men navni tínum gev dýrd, fyri tína miskunn, *og* fyri sannleika tíns skuld.
2 Hvørsvegna skuldu teir heidnu sagt, Hvar *er* nú Guð teirra?
3 Men vár Guð *er* í himnunum: hann hevur gjørt hvatsumhelst honum hevur hóvað.
4 Teirra skurðgudar *eru* silvur og gull, verkið av manna hondum.
5 Teir hava munnar, men teir tala ikki: eygu hava teir, men teir síggja ikki:
6 Teir hava oyru, men teir hoyra ikki: nøsir hava teir, men teir lukta ikki:
7 Teir hava hendur, men teir handfara ikki: føtur hava teir, men teir ganga ikki: eiheldur tala teir ígjøgnum sín háls.
8 Teir, sum gera teir, eru líkir teimum; *soleiðis er* hvør tann sum troystar á teir.
9 O Ísrael, troysta tú á HARR-

AN: hann *er* teirra hjálp og teirra skjøldur.
10 O hús Aarons, troysta á HARRAN: hann *er* teirra hjálp og teirra skjøldur.
11 Tit, sum óttast HARRAN, troystið á HARRAN: hann *er* teirra hjálp og teirra skjøldur.
12 HARRIN hevur verið minnugur um okkum: hann vil vælsigna *okkum;* hann vil vælsigna hús Ísraels; hann vil vælsigna hús Aarons.
13 Hann vil vælsigna teir sum óttast HARRAN, *bæði* smáar og miklar.
14 HARRIN skal økja tykkum meir og meir, tykkum og børn tykkara.
15 Tit *eru* vælsignaðir av HARRANUM, sum gjørdi himin og jørð.
16 Himinin, *enntá* himnarnir, *eru* HARRANS: men jørðina hevur hann givið til mannabørnini.
17 Tey deyðu prísa ikki HARRANUM; eiheldur nøkur sum fara niður inn í tøgn.
18 Men vit vilja vælsigna HARRAN frá hesi tíð fram og um ævirmeir. Prísið HARRANUM.

PSÁLMUR 116

EG elski HARRAN, av tí at hann hevur hoyrt mína rødd *og* mínar umbøningar.
2 Av tí at hann hevur boygt sítt oyra at mær, tí vil eg kalla uppá *hann* so leingi sum eg livi.
3 Deyðans sorgir umringaðu meg, og pínur helvitis fingu hald á mær: eg fann trongd og sorg.
4 Tá kallaði eg uppá navn HARRANS; O HARRI, eg bøni teg, útfría mína sál.
5 Náðisamur *er* HARRIN, og rættvísur; ja, vár Guð *er* miskunnarfullur.
6 HARRIN varðveitir hinar einføldu: eg varð førdur lágt, og hann hjálpti mær.
7 Vend aftur at hvílu tíni, O sál mín; tí at HARRIN hevur farið stórtøkiligani við tær.
8 Tí at tú hevurt útfríað mína sál frá deyða, míni eygu frá tárum, *og* mínar føtur frá at falla.
9 Eg vil ganga frammi fyri HARRANUM í landi teirra livandi.
10 Eg trúði, tí havi eg talað: eg var stórliga nívdur:
11 Eg segði í mínum skundi, Allir menn *eru* lygnarar.
12 Hvat skal eg HARRANUM veita *fyri* allar hansara vælgerðir mótvegis mær?
13 Frelsunnar bikar vil eg taka, og kalla uppá navn HARRANS.
14 Eg vil HARRANUM greiða míni heitstreingir nú í nærveruni av øllum hans fólki.
15 Dýrabærur í eygsjón HARRANS *er* deyði heilagra hans.
16 O HARRI, sanniliga, eg *eri* tænari tín; eg *eri* tænari tín, *og* sonur tænastumoyar tínar: tú hevurt loyst míni bond.
17 Eg vil ofra til tín takkarveitanar-sláturofrið, og vil kalla uppá navn HARRANS.
18 Eg vil HARRANUM greiða míni heitstreingir nú í nærveruni av øllum hans fólki,
19 Í forgørðum HARRANS húss, í miðjari tær, O Jerusalem. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 117

O PRÍSIÐ HARRANUM, allar tit tjóðir: prísið honum, øll tit fólk.
2 Tí at hansara miskunnarfulla blídni er mikil mótvegis okkum: og sannleiki HARRANS *varir* um ævir. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 118

O GEVIÐ HARRANUM tøkkir; tí at góður *hann er:* av tí at hansara miskunn *varir* um ævir.
2 Lat Ísrael nú siga, at hansara miskunn *varir* um ævir.

3 Lat Aarons hús nú siga, at hansara miskunn *varir* um ævir.
4 Lat teir nú, sum óttast HARRAN, siga, at hansara miskunn *varir* um ævir.
5 Eg kallaði uppá HARRAN í neyð: HARRIN svaraði mær, *og setti meg* í eitt stórt pláss.
6 HARRIN *er* á mínari síðu; eg vil ikki óttast: hvat kann maður gera mær?
7 HARRIN tekur mín part við teimum sum hjálpa mær: tí skal eg sjá *mína trá* uppá teir sum hata meg.
8 *Tað er* betri at troysta á HARRAN, enn at seta álit á mann.
9 *Tað er* betri at troysta á HARRAN, enn at seta álit á prinsar.
10 Allar tjóðir umringaðu meg umkring: men í HARRANS navni vil eg oyða tær.
11 Tær umringaðu meg umkring; ja, tær umringaðu meg umkring: men í HARRANS navni eg vil oyða tær.
12 Tær umringaðu meg umkring líkasum býflugur; tær eru sløktar eins og torna*greina*-eldurin: tí at í HARRANS navni eg vil oyða tær.
13 Sáran hevurt tú stoytt eftir mær, at eg mátti fallið: men HARRIN hjálpti mær.
14 HARRIN *er* mín styrki og songur, og er vorðin mín frelsa.
15 Røddin av fagnan og frelsu *er* í tabernaklunum hjá teimum rættvísu: HARRANS høgra hond innir reystliga.
16 HARRANS høgra hond er upphevjað: HARRANS høgra hond innir reystliga.
17 Eg skal ikki doyggja, men liva, og kunngera verk HARRANS.
18 HARRIN hevur agað meg sáran: men hann hevur ikki givið meg yvir at deyða.
19 Opna fyri mær rættvísinnar portur: eg vil fara inn í tey, *og* eg vil prísa HARRANUM:
20 Hetta HARRANS portur, inn í hvørt hinir rættvísu skulu innfara.
21 Eg vil prísa tær: tí at tú hevurt hoyrt meg, og ert vorðin mín frelsa.
22 Steinurin, *sum* byggjararnir havnaðu, er vorðin høvuðs horn*steinur*in.
23 Hetta er gerningur HARRANS; tað *er* undrunarsamt í eygum várum.
24 Hetta *er* dagurin *sum* HARRIN hevur gjørt; vit vilja fegnast og vera glaðir í honum.
25 Frels nú, eg bøni teg, O HARRI: O HARRI, eg bøni teg, send nú framgongd.
26 Vælsignaður *veri* hann sum kemur í navni HARRANS: vit hava vælsignað tykkum úr húsi HARRANS.
27 Guð *er* HARRIN, sum hevur sýnt okkum ljós: bindið sláturofrið við bondum, *alt* at altarsins hornum.
28 Tú *ert* Guð mín, og eg vil prísa tær: *tú ert* Guð mín, eg vil upphevja teg.
29 O gevið HARRANUM tøkkir; tí at góður *hann er:* tí hansara miskunn *varir* um ævir.

PSÁLMUR 119

א Â-LĔPH.

SIGNAÐIR *eru* hinir ódálkaðu í veginum, sum ganga í HARRANS lóg.
2 Signaðir *eru* teir sum halda hansara vitnisburðir, *og sum* søkja hann við heila hjartanum.
3 Teir eisini gera onga misgerð: teir ganga í vegum hans.
4 Tú hevurt áboðið *okkum* at halda tínar ásetingar dúgliga.
5 O at mínir vegir vórðu leiðbeindir til at halda tínar ásetingar!
6 Tá skal eg ei verða til skammar, tá ið eg havi fyrilit at øllum boðum tínum.

7 Eg vil tær prísa við reiðiligsemi hjarta*ns,* tá ið eg skal hava lært tínar rættvísu dómar.
8 Eg vil halda tínar ásetingar: O yvirgev meg ikki fullkomiliga.

ב BÊTH.

9 Við hvørjum skal ein ungur maður reinsa sín veg? við at geva gætur *hartil* samsvarandi við orð títt.
10 Við heila mínum hjarta havi eg søkt teg: O lat meg ikki reika frá boðum tínum.
11 Títt orð havi eg fjalt í hjarta mínum, at eg mátti ikki syndað ímóti tær.
12 Vælsignaður *ert* tú, O HARRI: lær meg tínar ásetingar.
13 Við mínum vørrum havi eg kunngjørt allar dómarnar av tínum munni.
14 Eg havi fegnast í vegi vitnisburða tína, eins *nógv sum* í øllum ríkidømum.
15 Eg vil grunda í tínum ásetingum, og hava fyrilit at tínum vegum.
16 Eg vil fragda mær í tínum ásetingum: eg vil ikki gloyma títt orð.

ג GÎ·MĚL.

17 Far stórtøkiliga við tænara tínum, *at* eg má liva, og halda títt orð.
18 Opna tú míni eygu, at eg má skoða undursom ting úr tíni lóg.
19 Eg *eri* ein fremmandur á jørðini: fjal ikki tíni boð frá mær.
20 Mín sál brotnar fyri longsulin *sum hon hevur* at tínum dómum til allar tíðir.
21 Tú hevurt hartað hinar hugmóðigu *sum eru* bannaðir, sum fara skeivir frá boðum tínum.
22 Flyt burtur frá mær spott og vanvirðing; tí eg havi hildið tínar vitnisburðir.
23 Prinsar eisini sótu *og* talaðu ímóti mær: *men* tín tænari grundaði í tínum ásetingum.
24 Tínir vitnisburðir eisini *eru* mín lyst *og* mínir ráðgevar.

ד DÂ·LĚTH.

25 Sál mín krøkist at støvinum: lívga tú meg samsvarandi við orð títt.
26 Eg havi kunngjørt mínar vegir, og tú hoyrdirt meg: lær meg tínar ásetingar.
27 Fá meg at skilja veg forskrifta tína: so skal eg tala um tíni undursomu verk.
28 Sál mín bráðnar vegna tungsemis: styrk tú meg sambært orði tínum.
29 Flyt burt frá mær lúgvingarvegin: og veit mær tína lóg náðisamliga.
30 Sannleiks-vegin havi eg valt: tínar dómar havi eg lagt *frammi fyri mær.*
31 Eg havi loðað við tínar vitnisburðir: O HARRI, set meg ikki til skammar.
32 Eg vil renna vegin hjá boðum tínum, tá ið tú skalt størra um hjarta mítt.

ה HÊ.

33 Lær meg, O HARRI, vegin hjá ásetingum tínum; og eg skal halda hann *framat* endanum.
34 Gev mær skil, og eg skal halda lóg tína; ja, eg skal geva ans eftir henni við heila *mínum* hjarta.
35 Fá meg at ganga á gøtu boð*orða* tína; tí eg fragdist harí.
36 Boygg mítt hjarta at tínum vitnisburðum, og ikki til havisjúku.
37 Vend burt mínum eygum frá at eygleiða fáfongd; *og* lívga tú meg í vegi tínum.
38 Grundfest títt orð at tænara tínum, hvør *heilvegis er givin* til ótta tín.

39 Vend burtur mítt spott sum eg óttist: tí at tínir dómar *eru* góðir.
40 Sí, mær hevur longst eftir forskriftum tínum: lívga meg í tíni rættvísi.

ו VAV.

41 Lat tínar miskunnir koma eisini at mær, O HARRI, *enntá* tína frelsu, samsvarandi við orð títt.
42 So skal eg hava hvarvið at svara honum sum spottar meg: tí eg líti á títt orð.
43 Og tak ikki sannleikans orð aldeilis úr mínum munni; tí at eg havi vónað á dómar tínar.
44 So skal eg halda tína lóg áframhaldandi um ævir og ævir.
45 Og eg vil ganga í frælsi: tí eg søki tínar forskriftir.
46 Eg vil tala um tínar vitnisburðir eisini frammi fyri kongum, og vil ikki skammast.
47 Og eg vil fragda mær í tínum boðum, sum eg havi elskað.
48 Mínar hendur eisini vil eg lyfta upp at tínum boðum, sum eg havi elskað; og eg vil grunda í tínum ásetingum.

ז ZÂIN.

49 Minst til orðið at tænara tínum, uppá hvørt tú hevurt volt mær at vóna.
50 Hetta *er* mín uggan í míni nívd: tí at títt orð hevur lívgað meg.
51 Hinir stoltu hava hildið meg stórligani fyri gjøldur: *tó* havi eg ikki hildið undan frá tíni lóg.
52 Eg mintist tínar dómar úr forðum, O HARRI; og havi uggað meg.
53 Ræðsla hevur tikið hald á mær uppá grund av hinum vondu sum yvirgeva lóg tína.
54 Tínar ásetingar hava verið mínir sangir í húsinum av míni pílagrímsferð.
55 Eg havi minst til navn títt, O HARRI, um náttina, og havi hildið lóg tína.
56 Hetta hevði eg, av tí at eg helt tínar fyriskipanir.

ח CḤÊTH.

57 *Tú ert* mín skamtur, O HARRI: eg havi sagt, at eg vildi halda tíni orð.
58 Eg bønaði tína vælvild við heila *mínum* hjarta: ver miskunnarfullur at mær samsvarandi við orð títt.
59 Eg hugsaði um vegir mínar, og vendi mínum fótum at vitnisburðum tínum.
60 Eg gjørdi skjótt, og útsetti ikki at halda tíni boð.
61 Bond teirra vondu hava rænt meg: *men* eg havi ikki gloymt tína lóg.
62 Á midnátt vil eg rísa at veita tær tøkkir uppá grund av tínum rættvísu dómum.
63 Eg *eri* ein lagsbróðir hjá øllum *teimum* sum óttast teg, og hjá teimum sum halda tínar fyriskipanir.
64 Jørðin, O HARRI, er full av miskunn tíni: lær meg tínar ásetingar.

ט TÊTH.

65 Tú hevurt farið væl við tænara tínum, O HARRI, samsvarandi við orð títt.
66 Lær meg góðan dóm og kunnleika: tí eg hava trúð tínum boðum.
67 Áðrenn eg varð nívdur, fór eg á strok: men nú havi eg hildið orð títt.
68 Tú *ert* góður, og gert gott; lær meg tínar ásetingar.
69 Hinir stoltu hava samantvinnað eina lygn ímóti mær: *men* eg vil halda tínar forskriftir við heila *mínum* hjarta.
70 Teirra hjarta er so feitt sum tálg; *men* eg fragdist í tíni lóg.
71 *Tað er* gott hjá mær, at eg

havi verðið nívdur; at eg mátti læra tínar ásetingar.
72 Lógin av tínum munni *er* betri at mær enn túsundir av gulli og silvuri.

י JÕD.

73 Tínar hendur hava gjørt meg og snikkað meg: gev mær skilning, at eg má læra tíni boð.
74 Teir, sum óttast teg, vilja verða glaðir tá ið teir síggja meg; av tí at eg havi vónað á títt orð.
75 Eg veit, O HARRI, at tínir dómar *eru* rættir, og *at* tú í trúfesti hevurt meg nívt.
76 Lat, eg biði teg, tína miskunnarfullu blídni vera til mína uggan, samsvarandi við orð títt at tænara tínum.
77 Lat tínar eymu miskunnir koma at mær, at eg má liva: tí at tín lóg *er* mín lyst.
78 Lat hinar stoltu skammast; tí at teir hava farið spillusamligani við mær uttan grund: *men* eg vil grunda í tínum forskriftum.
79 Lat teir, sum óttast teg, venda at mær; og teir sum hava kent tínar vitnisburðir.
80 Lat mítt hjarta vera heilbrigt í tínum ásetingum; at eg verði ei til skammar.

כ CÃPḤ.

81 Mín sál maktast vegna frelsu tína: *men* eg vóni á títt orð.
82 Míni eygu bila vegna orð títt, sigandi, Nær vilt tú ugga meg?
83 Tí eg eri vorðin líka *sum* ein kíkur í roykinum; *tó* gloymi eg ei tínar ásetingar.
84 Hvussu mangir *eru* dagarnir hjá tænara tínum? nær vilt tú útinna dóm á teir sum søkja at mær?
85 Hinir stoltu hava grivið holur til mín, sum *eru* ikki eftir lóg tíni.
86 Øll tíni boð *eru* trúføst: teir søkja at mær við órøttum; hjálp tú mær.
87 Teir høvdu nærum upptært meg uppiá jørð; men eg yvirgav ei tínar forskriftir.
88 Lívga meg eftir elskandi blíðsemi tíni; so skal eg halda vitnisburðin av tínum munni.

ל LÂ·MĚD.

89 Um ævir, O HARRI, títt orð er grundfest í himni.
90 Tín trúfesti *er fram*at øllum ættarliðum: tú hevurt grundfest jørðina, og hon verður.
91 Tey halda áfram henda dag samsvarandi við tínar regluskipanir: tí at øll *eru* tænarar tínir.
92 Uttan tín lóg *hevði verið* mínar fragdir, eg skuldi tá havt farist í míni nívd.
93 Eg vil aldri gloyma tínar forskriftir: tí at við teimum hevurt tú lívgað meg.
94 Eg *eri* tín, frels meg; tí at eg havi søkt tínar forskriftir.
95 Hinir vondu hava bíðað eftir mær til at oyðileggja meg: *men* eg vil umhugsa tínar vitnisburðir.
96 Eg havi sæð ein enda á allari fullkomnan: *men* títt boð *er* ovurhonds breitt.

מ MÊM.

97 O hvør elski eg lóg tína! hon *er* mín grundan allan dagin.
98 Tú, gjøgnum tíni boð, hevurt gjørt meg vísari enn mínir figgindar: tí at tey *eru* ævir hjá mær.
99 Eg havi meiri skil enn allir mínir lærarar: tí at tínir vitnisburðir *eru* mín grundan.
100 Eg skilji meir enn hinir avgomlu, av tí at eg haldi tínar forskriftir.
101 Eg havi afturhildið mínar føtur frá hvørjum illum vegi, at eg mátti halda títt orð.
102 Eg havi ikki vikið frá dómum tínum: tí at tú hevurt lært meg.

103 Hvør søt eru orð tíni smakki mínum! *ja, søtari* enn hunangur fyri munni mínum!
104 Ígjøgnum tínar forskriftir fái eg skil: tí hati eg hvønn falskan veg.

נ NÛN.

105 Títt orð *er* ein lampa hjá fótum mínum, og eitt ljós hjá gøtu míni.
106 Eg havi svorið, og eg vil útinna *tað*, at eg vil halda tínar rættvísu dómar.
107 Eg eri nívdur sera nógv: lívga meg, O HARRI, sambært orði tínum.
108 Góðtak, eg bøni teg, fríviljaofrini av mínum munni, O HARRI, og lær meg dómar tínar.
109 Mín sál *er* støðugt í míni hond: tó gloymi eg ei tína lóg.
110 Hinir vondu hava lagt eina snerru til mín: tó fór eg ikki skeivur frá forskriftum tínum.
111 Tínar vitnisburðir havi eg tikið sum ein arvalut um ævir: tí at teir *eru* fagnaður hjarta míns.
112 Eg havi boygt mítt hjarta at útinna tínar ásetingar alveg, *enntá framat* endanum.

ס SÁ-MĚCH.

113 Eg hati *fáfongdar* hugsanir: men tína lóg eg elski.
114 Tú *ert* mítt goymistað og skjøldur mín: eg vóni á títt orð.
115 Farið burtur frá mær, tit illgerarar: tí at eg vil halda boðini hjá Guði mínum.
116 Halt mær uppi sambært orði tínum, at eg má liva: og lat meg ikki skammast um mína vón.
117 Halt tú mær uppi, og eg skal vera tryggur: og eg vil hava fyrilit at tínum ásetingum áframhaldandi.
118 Tú hevurt traðkað niður allar teir sum fara skeivir frá tínum ásetingum: tí teirra svik *er* fals.
119 Tú seturt burtur allar jarðarinnar vondu *líka sum* grugg: tí elski eg tínar vitnisburðir.
120 Mítt kjøt nøtrar av ótta fyri tær; og eg eri ræddur fyri dómum tínum.

ע ÁIN.

121 Eg havi int dóm og rættlæti: eftirlæt meg ikki til kúgarar mínar.
122 Ver trygd fyri tænara tín til gott: lat ikki teir stoltu kúga meg.
123 Míni eygu bila vegna frelsu tína, og fyri orð rættvísi tínar.
124 Far við tænara tínum sambært miskunn tíni, og lær meg tínar ásetingar.
125 Eg *eri* tænari tín; gev mær skil, at eg má kenna tínar vitnisburðir.
126 *Tað er* tíð hjá *tær,* HARRI, at virka: *tí at* teir hava gjørt ógilda tína lóg.
127 Tí elski eg tíni boð uppum gull; ja, uppum fínt gull.
128 Tí meti eg allar *tínar* forskriftir *viðvíkjandi* øllum *tingum at vera* rættar; *og* eg hati hvønn falskan veg.

פ PÊ.

129 Tínir vitnisburðir *eru* undurfullir: tí heldur sál mín teir.
130 Inngongdin av orðum tínum gevur ljós; tað gevur teimum einføldu skil.
131 Eg opnaði mín munn, og stunaði: tí mær longdist eftir boðum tínum.
132 Hygg tú uppá meg, og ver miskunnarfullur at mær, sum tú plagart at gera at teim sum elska títt navn.
133 Tilrættislegg míni fet í orði tínum: og lat ikki nakra misgerð hava harradømi yvir mær.
134 Útfría meg frá kúganini av manni: so vil eg halda tínar forskriftir.
135 Fá títt andlit at skína uppá

tænara tín; og lær meg tínar ásetingar.
136 Áir av vøtnum renna niður eygu míni, av tí at teir halda ikki tína lóg.

צ TZĂD´-DÎ.

137 Rættvísur *ert* tú, O HARRI, og reiðiligir *eru* dómar tínir.
138 Tínir vitnisburðir, *sum* tú hevurt áboðið, *eru* rættvísir og sera trúfastir.
139 Mítt vandlæti hevur uppetið meg, av tí at mínir figgindar hava gloymt tíni orð.
140 Títt orð *er* sera skírt: tí elskar tín tænari tað.
141 Eg *eri* lítil og vanvirdur: *tó* gloymi eg ei tínar forskriftir.
142 Tín rættvísi *er* ein ævigtvarandi rættvísi, og tín lóg *er* sannleikin.
143 Trongd og angist hava tikið hald á mær: *tó eru* tíni boð mínar fragdir.
144 Rættvísin av tínum vitnisburðum *er* ævigtvarandi: gev mær skil, og eg skal liva.

ק KŌPH.

145 Eg rópti við heila *mínum* hjarta; hoyr meg, O HARRI: eg vil halda tínar ásetingar.
146 Eg rópti á teg; frels meg, og eg skal halda tínar vitnisburðir.
147 Eg kom morgun-degninginum á møti, og rópti: eg vónaði á títt orð.
148 Míni eygu koma *náttar*vøkunum á møti, at eg mátti grunda í tínum orði.
149 Hoyr mína rødd sambært elskandi blíðsemi tíni: O HARRI, lívga meg samsvarandi við dóm tín.
150 Teir nærkast sum fylgja eftir skaða: teir eru langt frá tíni lóg.
151 Tú *ert* nær, O HARRI; og øll tíni boð *eru* sannleiki.
152 Viðvíkjandi vitnisburðum tínum, eg havi vitað frá gomlum *av,* at tú hevurt grundlagt teir um ævir.

ר RÊSJ.

153 Umhugsa mína nívd, og útfría meg: tí eg gloymi ei tína lóg.
154 Før mína søk, og útfría meg: lívga meg samsvarandi við orð títt.
155 Frelsa *er* langt frá hinum vondu: tí at teir søkja ei tínar ásetingar.
156 Miklar *eru* tínar eymu miskunnir, O HARRI: lívga meg samsvarandi við dómar tínar.
157 Mangir *eru* mínir atsøkjarar og mínir figgindar; *tó* haldi eg ikki undan frá tínum vitnisburðum.
158 Eg skoðaði misbrótararnar, og varð harmur; av tí at teir hildu ikki títt orð.
159 Íhuga hvussu eg elski tínar forskriftir: lívga meg, O HARRI, samsvarandi við elskandi blíðsemi tína.
160 Títt orð *er* satt *frá* byrjanini: og hvør *og* ēin av tínum rættvísu dómum *varir* um ævir.

שׁ SJÎN.

161 Prinsar hava søkt at mær uttan grund: men mítt hjarta stendur í ærufrykt um títt orð.
162 Eg fegnist yvir títt orð, eins og ēin sum finnur miklan fong.
163 Eg hati og *mær* stendst við lúgving: *men* tína lóg eg elski.
164 Sjey ferðir um dag*in* eg prísi tær vegna tínar rættvísu dómar.
165 Miklan frið hava teir sum elska tína lóg: og einkið skal *volda* teim meinboga.
166 HARRI, eg havi vónað eftir frelsu tíni, og gjørt tíni boð.
167 Mín sál hevur hildið tínar vitnisburðir; og eg elski teir ovurhondsliga.

168 Eg havi hildið tínar forskriftir og tínar vitnisburðir: tí at allir mínir vegir *eru* frammi fyri tær.

ת TAV.

169 Lat mítt róp koma nær framfyri teg, O HARRI: gev mær skil samsvarandi við orð títt.
170 Lat mína umbøning koma framfyri teg: bjarga mær samsvarandi við orð títt.
171 Mínar varrar skulu mæla lov, tá ið tú hevurt lært meg tínar ásetingar.
172 Mín tunga skal tala um títt orð: tí at øll tíni boð *eru* rættvísi.
173 Lat tína hond hjálpa mær; tí eg havi valt tínar forskriftir.
174 Mær hevur longst eftir frelsu tíni, O HARRI; og tín lóg *er* mín lyst.
175 Lat mína sál liva, og hon skal prísa tær; og lat tínar dómar hjálpa mær.
176 Eg havi farið á strok líka *sum* ein burtvilstur seyður; søk tænara tín; tí eg gloymi ei tíni boð.

PSÁLMUR 120

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

Í MÍNI neyð eg ropti á HARRAN, og hann hoyrdi meg.
2 Bjarga míni sál, O HARRI, frá lúgvandi vørrum, *og* frá eini svikfullari tungu.
3 Hvat skal verða givið tær? ella hvat skal verða gjørt tær, tú falska tunga?
4 Hvassir ørvar hinna mektigu, við kolum av einiberi.
5 Eya meg, at eg útisiti í Mē-sĕch, *at* eg búgvi í Kē-dăr-s tjøldum!
6 Mín sál hevur leingi búð hjá honum sum hatar frið.
7 Eg *eri fyri* friði: men tá ið eg tali, *eru* teir fyri kríggi.

PSÁLMUR 121

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

EG vil eygu míni hevja til heyggjanna, hvaðani kemur mín hjálp.
2 Hjálp mín frá HARRANUM *kemur,* sum gjørdi himin og jørð.
3 Hann vil ikki loyva tín fót at vikast: hann, sum teg varðar, vil ikki durva.
4 Sí, hann, sum varðar Ísrael, skal hvørki durva ella sova.
5 HARRIN *er* vaktari tín: HARRIN *er* tín skuggi, við tína høgru hond.
6 Sólin skal ikki sláa teg um dag*in*, ella um nátt*ina* mánin.
7 HARRIN skal varðveita teg frá øllum illum: hann skal varðveita sál tína.
8 HARRIN skal varðveita tína útgongd og tína inngongd frá hesi tíð fram, og enntá um ævirmeir.

PSÁLMUR 122

Ein *hæddar*stiga-Sangur av Dávidi.

EG varð glaður, tá ið teir søgdu við meg, Latum okkum fara inn í hús HARRANS.
2 Okkara føtur skulu standa fyri innan lið tíni, O Jerusalem.
3 Jerusalem er bygt sum ein staður, sum er tætt pakkaður saman:
4 Hvagar ættargreinirnar fara niðan, ættargreinir HARRANS, til vitnisburð Ísraels, at veita tøkkir at navni HARRANS.
5 Tí at har eru sett dóms-hásætir, hásætir Dávids húss.
6 Biðjið um frið Jerusalems: teir skulu framganga sum elska teg.
7 Friður veri fyri innan múra tína, *og* framgongd fyri innan slott tíni.
8 Fyri brøðra mína og felaga mína sakir, vil eg nú siga, Friður *veri* fyri innan tín.
9 Vegna húss HARRANS Guðs várs vil eg søkja títt góða.

PSÁLMUR 123

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

TIL tín lyfti eg upp eygum mínum, O tú sum dvølist í himnunum.

2 Sí, eins og eyguni hjá tænarum *líta* at hond meistara sína, *og* eins og eyguni hjá eini moyggj at hond matmóður sínar; soleiðis *bíða* okkar eygu eftir HARRANUM Guði várum, inntil ið hann havi miskunn yvir okkum.

3 Hav miskunn yvir okkum, O HARRI, hav miskunn yvir okkum: tí at vit eru ovurhondsliga mettaðir við vanvirðing.

4 Vár sál er ovurhondsliga mettað við háðing teirra sum eru við ró, *og* við vanvirðing hinna stoltu.

PSÁLMUR 124

Ein *hæddar*stiga-Sangur av Dávidi.

UM *tað hevði* ikki *verið* HARRIN, sum var á okkara síðu, má Ísrael nú siga;

2 Um *tað* ikki *hevði verið* HARRIN, sum var á okkara síðu, tá ið menn risu upp ímóti okkum:

3 Tá høvdu teir svølgt okkum upp skjótt, tá ið teirra vreiði varð kynd ímóti okkum:

4 Tá høvdu vøtnini fløtt yvir okkum, streymurin hevði farið yvir okkara sál:

5 Tá høvdu hini stoltu vøtnini farið yvir okkara sál.

6 Vælsignaður *veri* HARRIN, sum hevur ikki givið okkum *sum* ein fong til teirra tenn.

7 Vár sál hevur komist undan, sum ein fuglur út úr snerruni hjá fugla*fangar*unum: snerran er brotin, og vit hava komist undan.

8 Vár hjálp *er* í navni HARRANS, hvør gjørdi himin og jørð.

PSÁLMUR 125

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

TEIR, sum troysta á HARRAN, *skulu vera* sum Zion fjall, *sum* kann ikki verða vikað, *men* verður um ævir.

2 *Eins og* fjøllini *eru* rundan um Jerusalem, soleiðis *er* HARRIN rundan um fólk sítt hiðanífrá enntá um ævir.

3 Tí at stavurin hjá teimum vondu skal ikki hvíla uppiá luti hinna rættvísu; at ikki hinir rættvísu seti fram sínar hendur at misgerð.

4 Ger gott, O HARRI, at *teimum ið veri seg* góðir, og mót *teimum ið eru* reiðiligir í sínum hjørtum.

5 Hvat viðvíkur slíkum sum snúgva til viks at sínum krókutu vegum, HARRIN skal leiða teir út við misgerðar-virkarunum: *men* friður *skal vera* uppiá Ísrael.

PSÁLMUR 126

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

TÁ ið HARRIN vendi aftur fangaskapi Zions, vóru vit líkasum teir sum droyma.

2 Tá varð okkara muður fyltur við látri, og okkara tunga við synging: tá søgdu teir hinna heidnu millum, HARRIN hevur gjørt mikil ting fyri teir.

3 HARRIN hevur gjørt mikil ting fyri okkum; *hvarum* vit eru glaðir.

4 Vend aftur okkara fangaskapi, O HARRI, sum streymarnir í suðri.

5 Teir, sum sáa í tárum, skulu heysta í frøi.

6 Hann, sum fer út og grætur, berandi dýrabært sáð, skal ivaleyst koma aftur við fagnan, berandi síni bundir *við sær*.

PSÁLMUR 127

Ein *hæddar*stiga-Sangur til Sálomons.

UTTAN HARRIN húsið byggi, streva teir til fánýtis sum byggja tað: uttan HARRIN staðin varði, vakir varðmaðurin *bert* til fánýtis.

2 *Tað er* fáfongt hjá tykkum at rísa upp tíðliga, at sita uppi seint,

at eta sorgar-breyðið: *tí at* soleiðis hann gevur sínum elskaða svøvn.

3 Sí, børn *eru* ein arvalutur HARRANS: *og* ávøkstur móðurlívsins *er* endurgjald *hans*.

4 Eins og ørvar *eru* í hondini á einum mektigum manni; soleiðis *eru* børn ungdómsins.

5 Sælur *er* tann maður sum hevur húsa sín fullan av teim: teir skulu ikki skammast, men teir skulu tala við fíggindarnar í portrinum.

PSÁLMUR 128

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

VÆLSIGNAÐUR *er* hvør tann sum óttast HARRAN; sum gongur á vegum hans.

2 Tí at tú skalt eta strevið av hondum tínum: sælur *skalt* tú *vera,* og *tað skal vera* væl *statt* við tær.

3 Tín kona *skal vera* sum eitt fruktagott víntræ við síðurnar av húsi tínum: tíni børn líka *sum* olivinplantur rundan um borð títt.

4 Sí, at soleiðis skal tann maðurin vera vælsignaður, sum óttast HARRAN.

5 HARRIN skal vælsigna teg úr Zion: og tú skalt síggja tað góða hjá Jerusalem allar dagar lívs tíns.

6 Ja, tú skalt síggja barnabørn tíni, *og* frið uppiá Ísrael.

PSÁLMUR 129

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

MANGA ferðina hava teir nívt meg frá mínum ungdómi, má Ísrael nú siga:

2 Manga ferðina hava teir nívt meg frá mínum ungdómi: tó hava teir ikki havt yvirvág ímóti mær.

3 Pløgararnir pløgdu uppiá mínum baki: teir gjørdu langar sínar foyrur.

4 HARRIN *er* rættvísur: hann hevur skorið sundur bond teirra vondu.

5 Lat teir allar verða fjamskaðar og vendar tilbakar, sum hata Zion.

6 Lat teir verða líkasum grasið *uppiá* húsatoppunum, sum følnar áðrenn tað veksur upp:

7 Við hvørjum sláingarmaðurin fyllir ikki hond sína; ella hann, sum bindur bundir, barm sín.

8 Eiheldur siga teir sum fara framvið, HARRANS signing *veri* uppiá tykkum: vit vælsigna tykkum í navni HARRANS.

PSÁLMUR 130

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

ÚR dýpdunum havi eg ropt á teg, O HARRI.

2 Harri, hoyr mína rødd: lat tíni oyru vera gáin fyri røddini á mínum umbøningum.

3 Um tú, HARRI, skuldirt *sett* merki *við* misgerðir, O Harri, hvør skal standast?

4 Men *til er* fyrigeving hjá tær, at tú mást verða óttaður.

5 Eg bíði eftir HARRANUM, sál mín bíðar, og á hans orð eg vóni.

6 Sál mín *bíðar* eftir Harranum meiri enn teir sum vakta eftir morgninum: *eg sigi, meiri enn* teir sum vakta eftir morgninum.

7 Lat Ísrael vóna á HARRAN: tí at hjá HARRANUM, *har er* miskunn, og hjá honum *er* ríkiligsom endurloysing.

8 Og hann skal endurloysa Ísrael frá øllum hansara misgerðum.

PSÁLMUR 131

Ein *hæddar*stiga-Sangur hjá Dávidi.

HARRI, mítt hjarta er ikki hástórt, ella míni eygu hálátug: eiheldur útøvi eg meg í miklum málevnum, ella í tingum ov høg fyri meg.

2 Vissuliga, eg havi háttað *mær* og kyrrað meg, eins og eitt barn sum er vant frá móður síni: mín sál *er* enntá sum eitt avvant barn.

3 Lat Ísrael vóna á HARRAN hiðanífrá og um ævir.

PSÁLMUR 132

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

HARRI, minst til Dávids, *og* allar hansara kvalir:
2 Hvussu hann HARRANUM svór, *og* heitti hinum mektiga *Guði* Jákobs;
3 Vissuliga, eg vil ikki koma inn í tabernakkul húss míns, ella fara upp í song mína;
4 Eg vil ei geva svøvn til eygu míni, *ella* blund til mínar eygnalokur,
5 Inntil eg finni fram eitt pláss til HARRANS, ein bústað til hins mektiga *Guðs* Jákobs.
6 Sí, vit hoyrdu um tað í Êph´ră-tăh: vit funnu tað í skógarins akrum.
7 Vit vilja fara inn í tabernakkul˘ hans: vit vilja tilbiðja við hansara fótskammul.
8 Reis *teg,* O HARRI, inn í hvílu tína; tú, og ørkin av tíni styrki.
9 Lat tínar prestar vera klæddar við rættvísi; og lat tínar heilagu rópa av frøi.
10 Fyri tænara tíns Dávids skuld, vend ikki burtur andlitið á tínum salvaða.
11 HARRIN hevur svorið tað *í* sannleika at Dávidi; hann vil ikki venda frá tí; Av ávøksti likams tíns vil eg seta uppá títt hásæti.
12 Um tíni børn vilji halda mín sáttmála og mín vitnisburð, sum eg skal frálæra teimum, *tá* skulu teirra børn eisini sita uppiá tínum hásæti um ævirmeir.
13 Tí at HARRIN hevur valt Zion; hann hevur tráað *tað* til sítt býli.
14 Hetta *er* mín hvíla um ævir: her vil eg dvøljast; tí at eg havi tráað hana.
15 Eg vil ríkiliga vælsigna hennara uppihald: eg vil metta hennara fátøku við breyði.
16 Eg vil eisini klæða hennara prestar við frelsu: og hennara heilagu skulu rópa hart av frøi.
17 Har vil eg fáa hornið hjá Dávidi at blóma: eg havi fyriskipað eina lampu til salvaða mín.
18 Hansara fíggindar vil eg klæða við skomm: men uppiá sjálvum honum skal hansara krúna blómka.

PSÁLMUR 133

Ein *hæddar*stiga-Sangur hjá Dávidi.

SÍ, hvør gott og hvør dámligt *tað er* hjá brøðrum at búgva saman í ëinleika!
2 *Tað er* eins og hin dýrabæra salva uppiá høvdinum, sum rann niður uppá skeggið, *enntá* skegg Aarons: sum fór niður til skeytini av hansara klæðum;
3 Sum døgg Hĕr´-mŏn-s, *og eins og døggin* sum dalaði uppá Zions fjøll: tí at HARRIN har skipaði signingina, *enntá* lív um ævirmeir.

PSÁLMUR 134

Ein *hæddar*stiga-Sangur.

SÍ, signið tit HARRAN, allir *tit* tænarar HARRANS, sum um nátt*ina* standa í HARRANS húsi.
2 Lyftið upp tykkara hendur *í* halgidóminum, og signið HARRAN.
3 HARRIN, sum gjørdi himin og jørð, teg signi úr Zion.

PSÁLMUR 135

PRÍSIÐ tit HARRANUM. Prísið tit navni HARRANS; prísið *honum,* O tit tænarar hjá HARRANUM.
2 Tit, sum standa í húsi HARRANS, í forgørðum húsar Guðs várs,
3 Prísið HARRANUM; tí at HARRIN *er* góður: syngið prísingar at hansara navni; tí at *tað er* yndisligt.
4 Tí at HARRIN hevur valt sær Jákob, *og* Ísrael til sín seregna skatt.
5 Tí at eg veit, at HARRIN *er* mikil, og *at* okkara Harri *er* omanfyri allar gudar.
6 Hvatsumhelst *ið* HARRANUM hóvaði, *tað* gjørdi hann í himni, og á jørð, í sjógvunum, og øllum djúpum plássum.

7 Hann elvir guvunum at stíga upp frá endum jarðarinnar; hann ger snarljósˇ til regnið; hann førir vindin úr sínum goymslubúrum.
8 Sump Egyptalands frumborna sló, bæði mans og djórs.
9 *Sump* sendi tekinˇ og undurˇ inn í miðju tína, O Egyptaland, omanyvir Pharaoh, og omanyvir allar hansara tænarar.
10 Sump miklar tjóðir sló, og miklar kongar vó;
11 Sĭ-hŏn, kong Amoritanna; og Ōg kong av Bá-sjān; og øll kongadømir Cānaans:
12 Og gav teirra land *til* ein arvalut, ein arvalut at Ísrael sínum fólki.
13 Títt navn, O HARRI, *varir* um ævir; *og* títt minni, O HARRI, út gjøgnum allar ættir.
14 Tí at HARRIN vil døma sítt fólk, og hann vil iðra seg viðvíkjandi sínum tænarum.
15 Skurðgudar hinna heidnu *eru* silvur og gull, verkið av mannahondum.
16 Teir hava munnar, men teir tala ikki; eygu hava teir, men teir síggja ikki;
17 Teir hava oyru, men teir hoyra ikki; eiheldur er *nakar* andadráttur í teirra munnum.
18 Teir, sum gera teir, eru líkir teimum: *soleiðis er* hvør tann sum lítur á teir.
19 Vælsignið HARRAN, O hús Ísraels: vælsignið HARRAN, O hús Aarons:
20 Vælsignið HARRAN, O hús Levīs: tit, sum óttast HARRAN, vælsignið HARRAN.
21 Vælsignaður veri HARRIN úr Zion, sum í Jerusalem býr. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 136

O GEVIÐ HARRANUM tøkkir; tí at góður *hann er:* tí hansara miskunn *varir* um ævir.
2 O gevið Guði guda tøkkir: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
3 O gevið tøkkir til Harra harra: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
4 Til hansara, sum aleina ger mikil undur: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
5 Til hansara, sum við vísdómi himnarnar gjørdi: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
6 Til hansara, sum tandi út jørðina uppiyvir vøtnunum: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
7 Til hansara, sum gjørdi mikil ljós: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
8 Sólina til at ráða um dag*in:* tí hansara miskunn *varir* um ævir:
9 Mánan og stjørnurnar til at ráða um nátt*ina:* tí hansara miskunn *varir* um ævir.
10 Til hansara, sum Egyptaland sló í teirra frumbornu: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
11 Og førdi út Ísrael frá teirra millum: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
12 Við eini sterkari hond, og við einum útstrektum armi: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
13 Til hansara, sum deildi Reyða-havið í partar: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
14 Og fekk Ísrael at fara ígjøgnum miðjuna av tí: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
15 Men kollrendi Pharaoh og hans herlið í Reyða-havinum: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
16 Til hansara, sum leiddi sítt fólk gjøgnum oyðuna: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
17 Til hansara, sum miklar kongar sló: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
18 Og vó navngitnar kongar: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
19 Sĭ-hŏn kong Amoritanna: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
20 Og Ōg, Bá-sjān-s kong: tí hansara miskunn *varir* um ævir:

21 Og til ein arvalut gav teirra land: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
22 *Enntá* ein arvalut at Ísrael sínum tænara: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
23 Hvør okkum mintist í okkara lágu støðu: tí hansara miskunn *varir* um ævir:
24 Og hevur endurloyst okkum frá okkara figgindum: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
25 Sum gevur mat til alt hold: tí hansara miskunn *varir* um ævir.
26 O veitið Guði himins tøkkir: tí hansara miskunn *varir* um ævir.

PSÁLMUR 137

VIÐ áirnar av Bábylon, har vit settust niður, ja, vit grótu, tá ið vit mintust Zion.
2 Vit hongdu okkara hørpur uppá pílatrøini í hennara mittu.
3 Tí har kravdu teir, sum bóru okkum burtur *til* fanga, av okkum ein song; og teir, sum oyddu okkum, *kravdu av okkum* kæti, *sigandi,* Syngið okkum *ēin* av sangum Zions.
4 Hvussu skulu vit syngja sang HARRANS í einum fremmandum landi?
5 Um eg teg gloymi, O Jerusalem, lat mína høgru hond gloyma *sítt kynstur.*
6 Um eg ikki teg minnist, lat mína tungu krøkjast til góman á munni mínum; um eg ikki taki Jerusalem framum mína fremstu frøi.
7 Minst til, O HARRI, børn Ē-dóm-s á Jerusalems degi; sum søgdu, Sora *tað,* sora *tað, enntá* til grundvøll tess.
8 O Bábylons dóttir, sum verður at verða oydd; sælur *skal hann vera,* sum endurlønar tær eins og tú hevurt avgreitt okkum.
9 Sælur *skal hann vera,* sum tekur og smekkar hini lítlu tíni ímóti steinunum.

PSÁLMUR 138

Ein Psálmur av Dávidi.

EG vil prísa tær við heila mínum hjarta: frammi fyri gudunum vil eg syngja tær *lov*prís*ing*ar.
2 Eg vil tilbiðja mótvegis heilaga templi tínum, og prísa tínum navni fyri tína elskandi blídni og fyri sannleika tín: tí at tú hevurt stórgjørt títt orð uppum alt títt navn.
3 Á tí degi tá ið eg rópti, tú svaraðirt mær, *og* styrktirt meg *við* styrki í míni sál.
4 Allir kongar jarðarinnar skulu prísa tær, O HARRI, tá ið teir hoyra orðini av tínum munni.
5 Ja, teir skulu syngja í vegum HARRANS: tí at mikil *er* HARRANS dýrd.
6 Hóast HARRIN *veri seg* háur, tó hevur hann fyrilit at teimum lítillátnu: men hinar stoltu hann kennir langt burturifrá.
7 Tó *at* eg gangi í miðjari trongd, tú vilt endurlívga meg: tú skalt rætta fram tína hond ímóti vreiði figginda mína, og tín høgra hond skal frelsa meg.
8 HARRIN vil fullkomna *tað sum* viðkemur mær: tín miskunn, O HARRI, *varir* um ævir: yvirgev ikki verk egnu handa tína.

PSÁLMUR 139

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

O HARRI, tú hevurt kannað meg, og kent *meg.*
2 Tú veitst mína siting niðri og mína rísing upp, tú skilurt mína hugsan langt burturifrá.
3 Tú umringart mína gøtu og mína ligging niðri, og ert kendur *við* allar vegir mínar.
4 Tí at *tað er* ikki eitt orð á míni tungu, *uttan,* sí, O HARRI, tú veitst tað heilt.
5 Tú hevurt umgirt meg fyri

aftan og fyri framman, og lagt tína hond uppá meg.

6 *Slíkur* kunnleiki *er* ov undurfullur fyri meg; hann er høgur, eg kann ikki *uppnáa* hann.

7 Hvagar skal eg fara frá anda tínum? ella hvagar skal eg flýggja frá nærveru tíni?

8 Um eg stígi upp inn í himin, tú *ert* har: um eg reiði upp mína brík í helviti, sí, tú *ert har*.

9 *Um* eg taki veingir morgunsins, *og* dvøljist í hinum ytsta parti havsins;

10 Enntá har skal hond tín leiða meg, og tín høgra hond skal halda mær.

11 Um eg sigi, Vissuliga skal myrkrið hylja meg; sjálvt náttin skal vera ljós kring meg.

12 Ja, myrkrið fjalir ikki fyri tær; men náttin skínur sum dagurin: myrkrið og ljósið *eru* bæði líka *fyri tær*.

13 Tí at tú hevurt átt míni nýru: tú hevurt dekkað meg í móðurlívi móður mínar.

14 Eg vil prísa tær; tí at eg eri óttaliga *og* undursamliga gjørdur: undrunarverd *eru* verk tíni; og *tað* sál mín veit heilt væl.

15 Mítt tilfar var ikki fjalt fyri tær, tá ið eg varð gjørdur í loyndum, *og* kynstriliga virkaður í hinum lægstu partum jarðarinnar.

16 Tíni eygu sóu mítt tilfar, enn verandi ófullkomin; og í tíni bók vóru allir *mínir limir* skrivaðir, *sum* í áframhaldni vórðu evnaðir, tá ið, *sum enn var,* eingin av teimum *var*.

17 Hvør dýrabærar eisini eru tínar hugsanir at mær, O Guð! hvør mikið er samtalið av teim!

18 *Um* eg skuldi talt tær, tær eru fleiri í tali enn sandurin: tá ið eg vakni, eri eg enn hjá tær.

19 Vissuliga, tú vilt vega teir vondu, O Guð: víkið tí frá mær, tit blóðigu menn.

20 Tí at teir tala ímóti tær vondliga, *og* tínir fíggindar taka *navn títt* í fáfongd.

21 Hati ikki eg teir, O HARRI, sum hata teg? og eri ikki eg harmur yvir teir sum rísa upp ímóti tær?

22 Eg hati teir við fullkomnum hatri: eg rokni teir mínar fíggindar.

23 Kanna meg, O Guð, og kenn mítt hjarta: royn meg, og kenn mínar hugsanir:

24 Og vita um *tað veri seg nakar* vondur vegur í mær, og leið meg í vegnum ævigtvarandi.

PSÁLMUR 140

Til hins hægsta Tónleikara,
Ein Psálmur av Dávidi.

ÚTFRÍA meg, O HARRI, frá tí ónda manninum: varðveit meg frá tí harðliga manninum;

2 Sum ímynda skaðar í hjarta *sínum;* støðugt eru teir savnaðir saman *til* kríggj.

3 Teir hava spískað sínar tungur líkasum ein høggormur; eiturorma-eitur *er* undir teirra vørrum. Sé-lâh.

4 Varðveit meg, O HARRI, frá hondum hins vonda; goym meg frá tí harðliga manninum; sum hava avrátt at kollrenna mínar gongdir.

5 Hinir stoltu hava krógvað eina snerru til mín, og bond; teir hava breitt eitt net við vegkantin; teir hava sett fellur til mín. Sé-lâh.

6 Eg segði við HARRAN, Tú *ert* Guð mín: hoyr rødd umbøningа mína, O HARRI.

7 O GUÐ Harrin, styrki frelsu mínar, tú hevurt dekkað mítt høvur í bardagadeginum.

8 Veit ikki, O HARRI, tráirnar hjá hinum vonda: frem ikki hans vonda snildarráð; *at ikki* teir upphevji seg. Sé-lâh.

9 *Hvat viðvíkur* høvdi teirra sum umringa meg umkring, lat meinið av teirra egnu varrum dekka teir.

10 Lat brennandi kol˙ falla omanyvir teir: lat teir verða kastaðar inn í eldin; inn í djúpar holur, at teir rísi ikki upp aftur.

11 Lat ikki ein óndan tosara verða grundfestan á jørðini: ónt skal veiða hin harðliga mann til at kollrenna *hann*.

12 Eg veit, at HARRIN vil handhevja søk teirra nívdu, *og* rætt teirra ørmu.

13 Vissuliga, hinir rættvísu skulu veita tøkkir at navni tínum: hinir reiðiligu skulu dvøljast í nærveru tíni.

PSÁLMUR 141

Ein Psálmur av Dávidi.

HARRI, eg rópi á teg: ger skjótt *av* at mær; læn oyra at míni rødd, tá ið eg rópi á teg.

2 Lat mína bøn verða setta fram framfyri teg *sum* roykilsi; *og* lyftingin upp av mínum hondum *sum* kvøld-sláturofrið.

3 Set eina vakt, O HARRI, fyri munni mínum; varða dyr varra mína.

4 Bend ikki mítt hjarta til *nakað* ilt ting, at útinna vond verk við monnum sum virka misgerð: og lat meg ikki eta av teirra krásum.

5 Lat hin rættvísa slá meg; *tað skal vera* ein blídni: og lat hann formana meg; *tað skal vera* ein framúrskarandi olja, *sum* skal ikki bróta mítt høvur: tí at enn *skal* mín bøn eisini *vera* í teirra skaðatilburðum.

6 Tá ið teirra dómarar eru kollrendir í steinutum støðum, skulu teir hoyra míni orð; tí at tey eru søt.

7 Okkara bein eru spjødd við gravarmunnan, sum tá ið ein høggur og klývur *við˙* uppiá jørðini.

8 Men míni eygu *eru* á teg, O GUÐ Harrin: á teg er mítt álit; eftirlat ikki mína sál neyðstadda.

9 Halt mær frá snerrunum, *sum* teir hava lagt til mín; og fellunum hjá misgerðar-virkarunum.

10 Lat hinar vondu falla í síni egnu gørn, ímeðan ið eg tillíka komist undan.

PSÁLMUR 142

Mās´-chīl av Dávidi; Ein Bøn tá ið hann var í hellinum.

EG rópti á HARRAN við míni rødd; at HARRANUM við míni rødd gjørdi eg mína umbøning.

2 Eg helti út mína klagu framfyri hann; eg sýndi frammi fyri honum mína trongd.

3 Tá ið mín andi var undirdíktur innan í mær, tá kendirt tú mína gøtu. Á veginum, á hvørjum eg gekk, hava teir loyniligani lagt eina snerru til mín.

4 Eg leit við *mína* høgru hond, og skoðaði, men *har var* eingin maður sum vildi kenna meg: skjól svitaðist mær; eingin maður legði í mína sál.

5 Eg rópti á teg, O HARRI: eg segði, Tú *ert* mítt skjól *og* mín skamtur í landi teirra livandi.

6 Gáa at mínum rópi; tí at eg eri førdur sera lágt: útfría meg frá mínum atsøkjarum; tí at teir eru sterkari enn eg.

7 Før mína sál út úr fongsli, at eg má prísa tínum navni: hinir rættvísu skulu umringa meg umkring; tí at tú skalt fara stórtøkiliga við mær.

PSÁLMUR 143

Ein Psálmur av Dávidi.

HOYR mína bøn, O HARRI, læn oyra til mínar umbøningar: í tíni trúfesti svara mær, *og* í tíni rættvísi.

2 Og innfar ikki inn í dóm við tænara tín: tí at í tíni eygsjón skal eingin maður livandi verða rættvísgjørdur.

3 Tí at fíggindin hevur søkt at míni sál; hann hevur sligið mítt

lív niður til jarðarinnar; hann hevur fingið meg at búgva í myrkri, eins og teir sum leingi hava verið deyðir.

4 Tí er mín andi undirdíktur innan í mær; mítt hjarta innan í mær er troystarleyst.

5 Eg minnist dagarnar í forðum; eg grundi yvir øll tíni verk; eg djúphugsi yvir verkið av tínum hondum.

6 Eg rætti fram mínar hendur at tær: míni sál *tyrstir* eftir tær, sum eitt tyrst land. Sē´-lâh.

7 Hoyr meg skundisligani, O HARRI: mín andi svitast: fjal ikki títt andlit frá mær, at ikki eg verði líkur teimum sum fara niður inn í holuna.

8 Fá meg at hoyra tína elskandi blídni um morgunin; tí á teg eg líti: fá meg at vita vegin, í hvørjum eg skuldi ganga; tí at eg lyfti upp mína sál at tær.

9 Útfría meg, O HARRI, frá mínum figgindum: eg flýggi at tær at fjala meg.

10 Lær meg at gera vilja tín; tí at tú *ert* Guð mín: tín andi *er* góður; leið meg inn í land reiðiligseminnar.

11 Lívga meg, O HARRI, fyri navns tíns skuld: fyri skuld rættvísi tínar før mína sál burtur úr trongd.

12 Og av tíni miskunn sker av mínar figgindar; og oyð allar teir sum níva mína sál: tí at eg *eri* tænari tín.

PSÁLMUR 144

Ein Psálmur av Dávidi.

VÆLSIGNAÐUR *veri* HARRIN mín styrki, sum lærir mínar hendur at kríggjast, *og* mínar fingrar at berjast:

2 Mín góðska, og mín festningur; mítt høga torn, og mín útfríari; mín skjøldur; og *hann,* á hvønn eg líti; sum undirleggur fólk mítt undir meg.

3 HARRI, hvat *er* maður, at tú bert kennskap til hansara! *ella* menniskjusonurin, at tú roknart við honum!

4 Maður er líkur við fáfongd: hansara dagar *eru* sum ein skuggi sum ferðast avstað.

5 Boygg tínar himnar, O HARRI, og kom niður: nem við fjøllini, og tey skulu rúka.

6 Kasta fram snarljós, og spjað teir: skjót út tínar ørvar, og oyð teir.

7 Send tína hond frá í erva; bjarga mær; og burtur úr miklum vøtnum útfría meg, frá hondini á fremmandum børnum;

8 Hvørs muður talar fáfongd, og teirra høgra hond *er* ein høgra hond av falsi.

9 Eg vil syngja ein nýggjan song at tær, O Guð: uppá ein psaltur *og* eitt tíggju-streingja ljóðføri vil eg syngja tær *lov*prís*ing*ar.

10 *Tað er hann* sum gevur kongum frelsu: sum útfríar Dávid, sín tænara, frá hinum skaðiliga svørði.

11 Bjarga mær, og útfría meg frá hondini á fremmandum børnum, hvørs muður talar fáfongd, og teirra høgra hond *er* ein høgra hond av falsi:

12 At okkara synir *mega vera* sum plantur, vaksnar upp í ungdómi sínum; *at* várar døtur *mega vera* sum hornsteinar, pussaðir *eftir* líksemini hjá einum slotti:

13 *At* okkara løður *mega vera* fullar, veitandi alskyns goymslu: *at* okkara seyður má bera fram túsundir og tíggju túsundir á gøtum várum:

14 *At* várir oksar *mega vera* sterkir at arbeiða; *at tað verði* eingin bróting inn, ella faring út; at *tað verði* eingin gremjan á gøtum várum.

15 Fegið *er tað* fólk, sum í slíkari støðu er: *ja,* fegið *er tað* fólk, hvørs Guð HARRIN *er.*

PSÁLMUR 145

Lovprísingar-Psálmur Dávids.

EG vil hálova tær, mín Guð, O kongur; og eg vil vælsigna títt navn um ævir og ævir.

2 Hvønn dag vil eg vælsigna teg; og eg vil prísa tínum navni um ævir og ævir.

3 Stórur *er* HARRIN, og stórligani at verða prísaður; og hansara stórleiki *er* órannsakiligur.

4 Ein ætt skal prísa tínum verkum fyri eini aðrari, og skal kunngera tínar mektigu gerningar.

5 Eg vil tala um hin dýrdsama heiðurin av tíni hátign, og um tíni undurfullu verk.

6 Og *menn* skulu tala um máttin av tínum ræðuligu gerningum: og eg vil kunngera tín mikilleika.

7 Teir skulu ríkiligani mæla minnið um tína miklu góðsku, og skulu syngja um tína rættvísi.

8 HARRIN *er* náðisamur, og fullur av várkunn; seinur til firtnis, og av miklari miskunn.

9 HARRIN *er* góður mót øllum: og hans eymu miskunnir *eru* yvir øllum hans verkum.

10 Øll tíni verk skulu prísa tær, O HARRI; og tínir heilagu skulu vælsigna teg.

11 Teir skulu tala um dýrdina av tínum kongadømi, og tala um tín mátt;

12 At gera kunnar fyri mannasonunum hansara mektigu gerningar, og hina dýrdsomu hátign av hansara kongadømi.

13 Títt kongadømi *er* eitt ævigtvarandi kongadømi, og títt harradømi *varir* út gjøgnum allar ættir.

14 HARRIN uppiheldur allar, sum falla; og reisir upp allar *teir, ið veri seg* boygdir niður.

15 Eyguni hjá øllum bíða eftir tær; og tú gevurt teim teirra mat í rættari tíð.

16 Tú leturt upp tína hond, og mettart tráina hjá hvørjum livandi tingi.

17 HARRIN *er* rættvísur í øllum vegum sínum, og heilagur í øllum verkum sínum.

18 HARRIN *er* nær at øllum teimum sum kalla uppá hann, hjá øllum sum kalla uppá hann í sannleika.

19 Hann vil uppfylla trá teirra sum óttast hann: hann eisini vil hoyra teirra róp, og vil frelsa teir.

20 HARRIN varðveitir allar teir sum elska hann: men allar hinar vondu vil hann oyða.

21 Mín muður skal tala HARRANS lov: og lat alt hold vælsigna hans heilaga navn um ævir og ævir.

PSÁLMUR 146

PRÍSIÐ tit HARRANUM. Prísa HARRANUM, O mín sál.

2 Meðan eg livi, vil eg prísa HARRANUM: eg vil syngja Guði mínum *lovprísing*ar, meðan eg havi nakra veran.

3 Setið ei tykkar álit á prinsar, *ella* á manssonin, í hvørjum eingin hjálp *er*.

4 Hans andadráttur fer fram, hann vendir aftur til jarðar sínar; í sjálvum tí degi týnast hansara hugsanir.

5 Sælur *er hann* sum *hevur* Jákobs Guð til sína hjálp, hvørs vón *er* á HARRAN sín Guð:

6 Sum gjørdi himin, og jørð, sjógvin, og alt sum harí *er:* sum varðveitir sannleika um ævir:

7 Sum útinnir dóm fyri hinar kúgaðu: sum gevur mat til hinar svongu. HARRIN loysir fangarnar:

8 HARRIN opnar *eygu* teirra blindu: HARRIN reisir teir sum eru niðurboygdir: HARRIN elskar teir rættvísu:

9 HARRIN varðveitir teir fremmandu; hann lættir um hinar faðirleysu og einkjuna: men veg teirra vondu hann vendir upp *og* niður.

10 HARRIN skal ríkja um ævir,

enntá tín Guð, O Zion, at øllum ættum. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 147

PRÍSIÐ tit HARRANUM: tí at *tað er* gott at syngja Guði várum *lov*prís*ing*ar; tí at *tað er* dámligt; *og* lov er sámiligt.

2 HARRIN byggir upp Jerusalem: hann savnar saman Ísraels útstoyttu.

3 Hann grøðir hinar brotnu í hjarta, og bindur um teirra sárˇ.

4 Hann telur stjarnanna tal; hann kallar tær allar viðˆ *teirra* nøvnum.

5 Mikil *er* Harri okkara, og av miklari makt: hansara skil *er* endaleyst.

6 HARRIN lyftir upp hinar eyðmjúku: hann kastar hinar vondu niður til jarðarinnar.

7 Syngið HARRANUM við takkarveitan; syngið Guði várum lov uppá hørpuna:

8 Sumᵖ himinin hylur við skýggjum, sumᵖ fyribýr regn til jørðina, sumᵖ fær gras at vaksa uppiá fjøllunum.

9 Hann gevur til djórið mat hans; *og* til hinar ungu ravnar sum rópa.

10 Hann fragdast ikki í styrki hestsins: hann hevur ongan tokka í leggjunum hjá einum manni.

11 HARRIN hevur tokka í teimum sum óttast hann, í teimum sum vóna á hansara miskunn.

12 Prísa HARRANUM, O Jerusalem; prísa tínum Guði, O Zion.

13 Tí at hann hevur styrkt stengurnar av tínum portrum; hann hevur signað tíni børn fyri innan teg.

14 Hann fær í lag frið *í* landamørkum tínum, *og* fyllir teg við tí fínasta av hveitinum.

15 Hann sendir fram boð sítt *uppá* jørð: hans orð sera snarliga rennur.

16 Hann gevur kava sum ull: hann spjaðir turrfrostin sum øskur.

17 Hann kastar fram ís sín sum *breyð*molar: hvør kann standa frammanfyri hansara kulda?

18 Hann sendir út sítt orð, og bræðir teir: hann veldur sínum vindi at blása, *og* vøtnini fløða.

19 Hann sýnir Jákobi sítt orð, sínar ásetingar og sínar dómar at Ísrael.

20 Hann hevur ei farið soleiðis við nakrari tjóð: og *hvat viðvikur hansara* dómum, tær hava ikki kent teir. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 148

PRÍSIÐ tit HARRANUM. Prísið tit HARRANUM frá himnunum: prísið honum í hæddunum.

2 Prísið tit honum, allir einglar hans: prísið tit honum, øll herlið hans.

3 Prísið tit honum, sól og máni: prísið honum, allar tit stjørnur av ljósi.

4 Prísið honum, tit himnar himna; og tit vøtn, sum *veri* uppiyvir himnunum.

5 Lat teir prísa navni HARRANS: tí hann beyð, og teir vórðu skaptir.

6 Hann eisini hevur grundfest teir um ævir og ævir: hann hevur gjørt eina løgskipan, sum skal ikki ganga undir.

7 Prísið HARRANUM frá jørðini, tit drekar, og øll djúp:

8 Eldur, og heglingur; kavi, og guva; stormutur vindur, uppfyllandi hans orð:

9 Fjøll, og allir heyggjar; fruktagóð trø, og øll sedris*trø:*

10 Villdjórˇ, og allur fenaður; skriðkyktˇ, og flúgvandi fuglur:

11 Jarðarinnar kongar, og øll fólk; prinsar, og allir dómarar jarðarinnar:

12 Bæði ungir menn, og moyggjar; gamlir menn, og børn:

13 Lat tey prísa navni HARRANS:

tí at hansara navn aleina er avbært; hansara dýrd *er* uppiyvir jørðini og himni.

14 Hann eisini upphevjar horn fólks síns, lov alra heilagu sína; *enntá* Ísraels barna, eitt fólk nær honum. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 149

PRÍSIÐ tit HARRANUM. Syngið ein nýggjan song at HARRANUM, *og* hansara lov í samkomuni hjá heilagum.

2 Lat Ísrael fegnast í honum sum gjørdi hann: lat børnini hjá Zion vera frødlig í sínum Kongi.

3 Lat teir prísa hansara navni í dansinum: lat teir syngja honum *lovprísing*ar við tamburīnini og hørpu.

4 Tí at HARRIN hevur tokka í sínum fólki: hann vil fríðka hinar eyðmjúku við frelsu.

5 Lat hinar heiløgu vera frøifullar í dýrd: lat teir syngja hart uppiá sínum legum.

6 *Lat* hinar høgu *prísanir* Guðs *vera* í teirra munni, og eitt tvíeggjað svørð í teirra hond;

7 At útinna hevnd uppá hinar heidnu, *og* revsingar uppá fólkið;

8 At binda teirra kongar við ketum, og teirra aðalsmenn við fjøtrum av jarni;

9 At útinna uppá teir hin skrivaða dóm: henda heiður hava allir hans heilagu. Prísið tit HARRANUM.

PSÁLMUR 150

PRÍSIÐ tit HARRANUM. Prísið Guði í halgidómi hans: prísið honum í hválvinum av hansara kraft.

2 Prísið honum fyri hansara mektigu gerningar: prísið honum samsvarandi við hansara framúrskarandi mikilleika.

3 Prísið honum við ljóðinum av lúðrinum: prísið honum við psaltrinum og hørpuni.

4 Prísið honum við tamburīnini og dansi: prísið honum við streingjaðum ljóðførum og bjølgfloytum.

5 Prísið honum uppá hinar hart-ljóðandi glymskálir: prísið honum uppá hinar hátt-ljóðandi glymskálir.

6 Lat hvørt ting, sum andadrátt hevur, prísa HARRANUM. Prísið tit HARRANUM.

ORÐTØKINI.

KAPITUL 1

ORÐTØK Sálomons, sonar Dávids, Ísraels kongs;

2 Til at kenna vísdóm og leiðbeining; til at fata orðini av skili;

3 Til at taka við leiðbeining av vísdómi, rættlæti, og dómi, og rættferð;

4 Til at geva snúni til hinna einføldu, til hins unga mans kunnleika og hygni.

5 Ein vísur *maður* vil hoyra, og vil økja um lærdóm; og ein skilamaður skal náa at vísum ráðum:

6 Til at skilja eitt orðtak, og týðingina; orð hinna vísu, og teirra myrku framsagnir.

7 ¶ HARRANS ótti *er* byrjanin til kunnleika: *men* dárar vanvirða vísdóm og leiðbeining.

8 Sonur mín, hoyr leiðbeining faðirs tíns, og yvirgev ikki lóg móður tínar:

9 Tí at tey *skulu vera* eitt náðisprýði hjá høvdi tínum, og ketur um háls tín.

10 ¶ Sonur mín, um syndarar lokki teg, samtykk tú ei.

11 Um teir sigi, Kom við okkum,

latum okkum liggja *á* lúri eftir blóði, latum okkum lúra loyniliga eftir hinum sakleysa uttan grund:
12 Latum okkum svølgja teir upp livandi sum grøvin; og heilar, sum teir ið fara niður inn í holuna:
13 Vit skulu finna alt dýrabært *figgjar*evni, vit skulu fylla vári hús við ráni:
14 Kasta inn tín lut okkara millum; latum okkum allar hava ēin pung:
15 Sonur mín, gakk ikki tú á veginum við teimum; halt aftur tínum fóti frá teirra leið:
16 Tí at teirra føtur renna til ilt, og inna skund at hella *út* blóð.
17 Vissuliga verður netið til fánýtis breitt í eygsjónini á nøkrum fugli.
18 Og teir liggja *á* lúri eftir *egna* blóði sínum; teir lúra loyniligani eftir sínum *egnu* lívum.
19 Soleiðis *eru* vegirnir hjá hvørjum tí sum er grádigur eftir vinningi; *sum* tekur burt lívið hjá ánarum tess.
20 ¶ Vísdómur rópar fyri uttan; hann mælir síni rødd í gøtunum:
21 Hann rópar í tí fremsta samleiðar-plássinum, í opningunum av portrunum: í staðinum mælir hann orðum sínum, *sigandi,*
22 Hvør leingi, tit hinir einføldu, vilja tit elska einfaldni? og háðararnir fragdast í síni háðan, og dárar hata kunnleika?
23 Vendið tykkum fyri formaning míni: sí, eg vil hella út anda mín at tykkum, eg vil gera kunn míni orð at tykkum.
24 ¶ Av tí at eg havi kallað, og tit sýttu; eg havi rætt út mína hond, og eingin maður gav gætur;
25 Men tit hava gjørt til einkiðs alla mína tilráðing, og skoyttu um onga av míni formaning:
26 Eg eisini vil læa eftir tykkara skaðatilburði; eg vil spotta tá ið tykkara ótti kemur;
27 Tá ið tykkara ótti kemur sum oyðing, og tykkara oyðilegging kemur sum ein meldurvindur; tá ið neyð og angist kemur uppá tykkum.
28 Tá skulu teir kalla uppá meg, men eg vil ikki svara; teir skulu søkja meg snimma, men teir skulu ikki finna meg:
29 Fyri at teir hataðu kunnleika, og valdu ikki ótta HARRANS:
30 Teir skoyttu ikki um mína tilráðing: teir vanvirdu alla mína formaning.
31 Tí skulu teir eta av ávøksti egna vegar síns, og verða mettaðir við sínum egnu snildarráðum.
32 Tí at vendingin burtur hjá teimum einføldu skal vega teir, og framgongdin hjá dárum skal oyða teir.
33 Men hvør*ið*so lýður á meg, skal búgva tryggliga, og skal vera kvirrur frá ótta fyri illum.

KAPITUL 2

SONUR mín, um tú vilt taka við orðum mínum, og fjala boðini hjá mær hjá tær;
2 So at tú boyggi títt oyra at vísdómi, *og* seti í verk títt hjarta til skils;
3 Ja, um tú rópart eftir kunnleika, *og* lyftirt upp tíni rødd eftir skili;
4 Um tú søkirt hann sum silvur, og sóknarst eftir honum sum *eftir* fjaldum dýrgripum;
5 Tá skalt tú skilja HARRANS ótta, og finna kunnleika Guðs.
6 Tí at HARRIN gevur vísdóm: út úr hans munni *kemur* kunnleiki og skil.
7 Hann leggur niðurfyri sunnan vísdóm til hinna rættvísu: *hann er* ein skjøldur fyri teimum ið ganga reiðiliga.
8 Hann varðar dóms-gøturnar,

og varðveitir vegin hjá heilagu sínum.
9 Tá skalt tú skilja rættvísi, og dóm, og rættferð; *ja,* hvørja góða gøtu.
10 ¶ Tá ið vísdómur innfer inn í hjarta títt, og kunnleiki er dámligur sál tíni;
11 Skal hygni varðveita teg, skil skal varða teg:
12 Til at bjarga tær frá vegi hins ónda *mans,* frá manninum sum talar rangvørgar lutir;
13 Sum[P] fara frá reiðiligleikans gøtum, til at ganga á myrkursins vegum;
14 Sum[P] fegnast at gera ilt, *og* fragdast í rangvørgni hinna vondu;
15 Hvørs vegir *eru* krókutir, og *teir* rangvørgir í gøtum sínum:
16 Til at útfría teg frá hini fremmandu kvinnu, *enntá* frá hini fremmandu *sum* smikrar við orðum sínum;
17 Sum yvirgevur leiðbeinara ungdóms síns, og gloymir sáttmála Guðs síns.
18 Tí hennara hús bendir at deyða, og hennara gøtur at teimum deyðu.
19 Eingir, sum fara at henni, venda aftur; eiheldur taka teir hald á gøtum lívsins.
20 At tú mást ganga í góðra *manna* vegi, og halda gøtur hinna rættvísu.
21 Tí hinir reiðiligu skulu búgva í landinum, og hinir fullkomnu skulu verða verandi í tí.
22 Men hinir vondu skulu verða skornir av frá jørðini, og misbrótararnir skulu verða slitnir upp *við* rót úr henni.

KAPITUL 3

SONUR mín, gloym ikki lóg mína; men lat hjarta títt halda míni boð:
2 Tí at longd av døgum, og langt lív, og frið, skulu tey leggja afturat til tín.
3 Lat ikki miskunn og sannleika yvirgeva teg: bint tey um háls tín; skriva tey uppá talvu hjarta tíns:
4 So skalt tú finna góðtokka og gott skil í eygsjón Guðs og mans.
5 ¶ Lít á HARRAN við øllum hjarta tínum; og halla *tær* ikki at tínum egna skili.
6 Á øllum tínum vegum viðurkenn hann, og hann skal leiðbeina gøtur tínar.
7 ¶ Ver ikki vísur í tínum egnu eygum: óttast HARRAN, og vík frá illum.
8 Tað skal vera heilsa til nalva tín, og mergur til bein tíni.
9 Æra HARRAN við tínum *figgjar*evni, og við frumávøkstunum av allari tíni grøði:
10 So skulu tínar løður verða fyltar við ríkiligum, og tínar persur skulu bresta út við nýggjum víni.
11 ¶ Sonur mín, vanvirð ikki aging HARRANS; eiheldur verð móður av rættleiðing hans:
12 Tí at hvønn HARRIN elskar, hann rættleiðir; enntá eins og ein faðir tann son, *í hvørjum* hann fragdast.
13 ¶ Fegin *er* tann maður, *sum* finnur vitsku; og tann maður, *ið* vinnur fatan.
14 Tí at handilsskapurin av henni *er* betri enn handilsskapurin av silvuri, og vinningurin harav enn fínt gull.
15 Hon *er* meiri dýrabær enn rubīnar: og øll tey ting, *ið* tú kanst tráa, eru ikki at verða sammett henni.
16 Longd av døgum *er* í høgru hond hennara; *og* í hennara vinstru hond ríkidømir og heiður.
17 Hennara vegir *eru* vegir av dámligleika, og allar hennara gøtur *eru* friður.
18 Hon *er* eitt lívstræ fyri teimum sum leggja hald uppá hana: og sælur *er hvør tann* sum afturheldur hana.
19 HARRIN við vísdómi hevur

grundlagt jørðina; við^ kunnleika hevur hann grundfest himnarnar.
20 Við^ hansara kunnleika eru dýpdirnar brotnar upp, og skýggini drúpa niður døggina.
21 ¶ Sonur mín, lat ikki tey víkja frá eygum tínum: varða sunnan vísdóm og hygni:
22 So skulu tey vera lív hjá sál tíni, og náði til háls tín.
23 Tá skalt tú ganga á vegi tínum tryggliga, og tín fótur skal ikki snáva.
24 Tá ið tú legst niður, skalt tú ei vera ræddur: ja, tú skalt leggjast niður, og tín svøvnur skal vera søtur.
25 Ver ikki ræddur fyri bráðum ótta, eiheldur fyri oyðing hinna vondu, tá ið hon kemur.
26 Tí at HARRIN skal vera títt mót, og skal varða tín fót frá at verða tikin.
27 ¶ Afturhalt ikki gott frá teimum, til hvørja tað er skyldugt, tá ið tað er í máttinum hjá tíni hond at gera *tað*.
28 Sig ikki við næsta tín, Far, og kom aftur, og í morgin vil eg geva; tá ið tú hevurt tað hjá tær.
29 Upphugsa ikki ilt ímóti næsta tínum, við tað at hann býr tryggliga hjá tær.
30 ¶ Stríð ikki við ein mann uttan grund, um hann einkið mein havi gjørt tær.
31 ¶ Øvunda tú ikki kúgaran, og vel ongan av hansara vegum.
32 Tí hin rangvørgi *er* andstygd fyri HARRANUM: men hansara loyndarmál *er* hjá teimum rættvísu.
33 ¶ HARRANS banning *er* í húsi hins vonda: men hann vælsignar bústaðin hjá teimum rættlátu.
34 Vissuliga spottar hann spottararnar: men hann gevur náði at hinum lítillátnu.
35 Hinir vísu skulu arva dýrd: men skomm skal vera framflutningurin hjá dárum.

KAPITUL 4

HOYRIÐ, tit børn, leiðbeiningina hjá einum faðiri, og gáið *eftir* at kenna skil.
2 Tí eg gevi tykkum góða Guðslæru, yvirgevið tit ikki mína lóg.
3 Tí at eg var sonur faðirs míns, eymur og einasti *háttelskaður* í eygsjón móður mínar.
4 Hann lærdi meg eisini, og segði við meg, Lat hjarta títt afturhalda orð míni: halt míni boð, og liv.
5 Vinn vitsku, vinn fatan: gloym *tað* ikki; eiheldur halt undan frá orðum munns míns.
6 Yvirgev hana ikki, og hon skal varðveita teg: elska hana, og hon skal varða teg.
7 Vitska *er* aðal luturin; *tessvegna* vinn vitsku: og við allari tíni skaffan, skaffa fatan.
8 Upphevja hana, og hon skal framflyta teg: hon skal føra teg til heiðurs, tá ið tú umfevnirt hana.
9 Hon skal geva til høvurs tíns eitt náðis-prýði: eina krúnu av dýrd skal hon lata til tín.
10 Hoyr, O sonur mín, og tak við framsagnum mínum; og árini av tínum lívi skulu verða mong.
11 Eg havi lært teg í vitskunnar vegi; eg havi leitt teg í røttum gøtum.
12 Tá ið tú gongurt, skulu fet tíni ei vera trongd *um;* og tá ið tú rennurt, skalt tú ikki snáva.
13 Tak fast hald á leiðbeining; lat *hana* ikki fara: varða hana; tí at hon *er* títt lív.
14 ¶ Inngakk ikki inn á gøtu teirra vondu, og far ikki á óndra *manna* vegi.
15 Skýggja tað, far ikki framvið tí, vend frá tí, og far avstað.
16 Tí at teir sova ikki, uttan teir havi gjørt mein; og teirra svøvnur verður tikin burt, uttan *so* teir voldi *onkrum* at falla.
17 Tí at teir eta vondskunnar

breyð, og drekka harðskaparins vín.
18 Men leið hinna rættvísu *er* eins og hitt skínandi ljósið, sum skínur meira og meira at hinum fullkomna degi.
19 Vegur hinna vondu *er* eins og myrkur: teir vita ikki, um hvat teir snáva.
20 ¶ Sonur mín, gáa eftir orðum mínum; boygg títt oyra at framsagnum mínum.
21 Lat tey ikki víkja frá eygum tínum; varða tey í miðjum hjarta tínum.
22 Tí at tey *eru* lív hjá teimum sum finna tey, og heilsa fyri alt teirra kjøt.
23 ¶ Varða títt hjarta við allari ídni; tí at út úr tí *eru* úrrenningar lívsins.
24 Koyr burt frá tær ein rangvørgan munn, og spiltar varrar koyr fjart frá tær.
25 Lat tíni eygu hyggja beint áfram, og lat tínar eygnalokur líta beint framfyri teg.
26 Umhugsa gøtu fóta tína, og lat allar tínar vegir vera grundfestar.
27 Vend ikki til hinnar høgru handar ella til hinnar vinstru: firra tín fót frá illum.

KAPITUL 5

SONUR mín, gáa at vísdómi mínum, *og* bend títt oyra til skil mítt:
2 At tú mást geva gætur um hygni, og *at* tínar varrar mega varða kunnleika.
3 ¶ Tí at varrarnar hjá eini fremmandari kvinnu drúpa *sum* ein hunangskøka, og hennara munnur *er* mjúkari enn olja:
4 Men hennara endi er beiskur sum malurt, hvassur sum eitt tvíeggjað svørð.
5 Hennara føtur ganga niður til deyða; hennara fet taka hald á helviti.
6 At ikki tú skuldirt umhugsað lívsins gøtu, hennara vegir eru flytiligir, *at* tú kanst ei kenna *teir*.
7 Hoyrið meg tí nú, O tit børn, og víkið ikki frá orðunum av mínum munni.
8 Firra tín veg fjart frá henni, og kom ikki nær hurðini á hennara húsi:
9 At ikki tú gevi tín heiður at øðrum, og tíni ár at hinum grimmu:
10 At ikki fremmandir verði fyltir við eyði tínum; og tíni strev *verði* í húsinum hjá einum fremmandum;
11 Og tú harmi at endanum, tá ið títt kjøt og tín kroppur eru upptærd,
12 Og sigi, Hvør havi eg hatað leiðbeining, og mítt hjarta vanvirt formaning;
13 Og havi ikki aktað røddina hjá mínum lærarum, ella boygt mítt oyra til teirra sum leiðbeindu meg!
14 Eg var næstan í øllum illum í miðjari samkomuni og savnaðinum.
15 ¶ Drekk vøtn úr tíni egnu veit, og rennandi vøtn úr tínum egna brunni.
16 Lat tínar keldur verða dreivdar umkring, *og* áir av vøtnum í gøtunum.
17 Lat tær vera einans tínar egnu, og ikki fremmandra hjá tær.
18 Vælsignað veri kelda tín: og fegnast við vívi ungdóms tíns.
19 *Veri hon sum* hin elskandi hind og *hitt* dámliga rádýr; lat hennara bróst teg nøkta á øllum tíðum; og veri tú bergtikin altíð av hennara ást.
20 Og hví vilt tú, sonur mín, vera bergtikin av eini fremmandari kvinnu, og umfevna barmin á eini fremmandari?
21 Tí at vegirnir hjá manni

eru frammi fyri eygum HARRANS, og hann yvirvigar allar hansara gongdir.

22 ¶ Hans egnu misgerðir skulu taka hin vonda sjálvan, og hann skal verða hildin við bondunum av sínum syndum.

23 Hann skal doyggja uttan leiðbeining; og í stórleikanum av sínum dárskapi skal hann fara til stroks.

KAPITUL 6

SONUR mín, um tú veri *teg* gingin í ábyrgd fyri vin tín, *um* tú hevurt tikist í hendur við ein fremmandan,

2 Ert tú snerraður við orðunum av tínum munni, tú ert tikin við orðunum av tínum munni.

3 Ger hetta nú, sonur mín, og útfría teg sjálvan, tá ið tú ert komin inn í hondina á vini tínum; far, eyðmýk teg sjálvan, og ger vissan tín vin.

4 Gev ikki svøvn til eygu tíni, ella blund til eygnalok tíni.

5 Útfría teg sjálvan sum eitt rádýr frá *veiðimansins* hond, og sum ein fuglur frá fugla*fangar*ans hond.

6 ¶ Far til meyruna, títt letivætti; umhugsa hennara vegir, og verð vísur:

7 Sum, havandi ongan leiðbeinara, umsjónarmann, ella stjórnara,

8 Skaffar sín mat um summarið, *og* savnar sín mat um heystið.

9 Hvussu leingi vilt tú sova, O letingi? nær vilt tú reisa *teg* úr tínum svøvni?

10 *Enn* ein lítlan svøvn, ein lítlan blund, eitt sindur av foldan av hondunum til at sova:

11 So skal tín armóð koma sum ēin sum ferðast, og títt trot sum ein herbúgvin maður.

12 ¶ Ein óflýggjaligur persónur, ein vondur maður, gongur við einum rangvørgum munni.

13 Hann blunkar við eygum sínum, hann talar við fótum sínum, hann frálærir við fingrum sínum;

14 Rangvørgni *er* í hjarta hans, hann upphugsar skaða støðugt; hann sáar misljóð.

15 Tí skal hansara skaðatilburður koma brádliga; brádliga skal hann verða brotin uttan hjálparmiddul.

16 ¶ Hesi seks *tingini* hatar HARRIN: ja, sjey *eru* ein andstygd yvirfyri honum:

17 Eitt hástórt eygnabrá; ein lúgvandi tunga; og hendur, sum úthella sakleyst blóð;

18 Eitt hjarta, sum upphugsar vondar ímyndanir; føtur, ið veri *seg* fljótir í at renna til mein;

19 Eitt falskt vitni, *sum* talar lygnir; og hann, ið sáar misljóð millum brøðra.

20 ¶ Sonur mín, halt boðið hjá faðir tínum, og yvirgev ikki lógina hjá móður tíni:

21 Bint tey áframhaldandi uppá hjarta títt, *og* knýt tey um háls tín.

22 Tá ið tú gongurt, skal tað leiða teg; tá ið tú svevurt, skal tað varða teg; og *tá ið* tú vaknart, skal tað tala við teg.

23 Tí at boðið *er* ein lampa; og lógin *er* ljós; og leiðbeiningarátalur *eru* lívsins vegur:

24 Til at halda teg frá hini óndu kvinnu, frá smikrinum av tunguni hjá eini fremmandari kvinnu.

25 Girnast ikki eftir hennara vakurleika í hjarta tínum; eiheldur lat hana taka teg við eygnalokum sínum.

26 Tí við brúki av eini horutari kvinnu *verður ein maður førdur* til eitt breyðsstykki: og horinnan vil veiða eftir hinum dýrabæra lívi.

27 Kann ein maður taka eld í barm sín, og hansara klæðir ei verða brend?

28 Kann ēin ganga uppiá heitum kolum, og hans føtur ei verða brendir?

29 Soleiðis hann, sum fer inn til ektakonu næsta síns; hvørsumhelst *ið* nemur við hana, skal ei vera sakleysur.

30 *Menn* vanvirða ikki ein tjóv, um hann stjali til at metta sína sál, tá ið hann er svangur;

31 Men *um* hann verði funnin, skal hann endurbøta sjeyfalt; hann skal geva alt *fíggjar*evni húss síns.

32 *Men* hvørjum*ið*so fremur hordóm við eini kvinnu, vantar skil: hann, *ið* ger tað, oyðileggur sína egnu sál.

33 Eitt sár og vanæru skal hann fáa; og hansara skemd skal ei verða turkað burt.

34 Tí at ástbrelni *er* øði mans: tí vil hann ikki spara á hevndardeginum.

35 Hann vil ei geva gætur eftir nøkrum loysigjaldi; eiheldur vil hann hvíla nøgdur, tó *at* tú gevurt nógvar gávur.

KAPITUL 7

SONUR mín, varða orð míni, og legg niðurfyri míni boð hjá tær.

2 Halt boð míni, og liv; og mína lóg sum eygnastein eyga tíns.

3 Bint tey uppá fingrar tínar, skriva tey uppá talvu hjarta tíns.

4 Sig við speki, Tú *ert* systir mín; og kalla vitsku *tína* skyldkonu:

5 At tær mega halda tær frá hini fremmandu kvinnu, frá hini fremmandu *sum* smikrar við orðum sínum.

6 ¶ Tí við gluggan á mínum húsi eg hugdi ígjøgnum mína gluggarammu,

7 Og skoðaði hinna einføldu millum, eg greinaði ungdómanna millum eitt ungmenni — tómur fyri skil,

8 Farandi ígjøgnum strætið, nær hjørni hennara; og hann fór vegin til húss hennara,

9 Í hálvalýsinum, um kvøldið, í tí svørtu og myrku náttini:

10 Og sí, tað møtti honum ein kvinna *við* skrúðinum av eini skøkju, og sniðfundig í hjarta.

11 (Hon *er* harð*mælt* og treisk; hennara føtur støðast ikki í húsi hennara:

12 Nú *er hon* fyri uttan, nú á gøtunum, og liggur á lúri við hvørt hjørn.)

13 So hon fangaði hann, og kysti hann, *og* við einum ónærisligum andliti segði við hann,

14 *Eg havi* friðoffur˘ hjá mær; henda dag havi eg rindað míni heitir.

15 Tí kom eg fram at hitta teg, ídnisligani at søkja títt andlit, og eg havi funnið teg.

16 Eg havi dekkað mína song við teppadekkingum, við útskornum *verkum,* við fínum líni úr Egyptalandi.

17 Eg havi angalagt mína song við myrrhu, alǒeum, og kaneli.

18 Kom, latum okkum taka okkara mettu av alski inntil morgunin: latum okkum linna okkum sjálvum við alskum.

19 Tí at húsmeistarin *er* ikki heima, hann er farin eina langa ferð:

20 Hann hevur tikið ein sekk av peningi við sær, *og* vil koma heim á tí ásetta degi.

21 Við sínum nógva fagra tosi voldi hon honum at geva eftir, við smikrinum av sínum varrum noyddi hon hann.

22 Hann fer aftaná henni beinanvegin, sum ein oksi fer til slátringina, ella sum ein dári til gapistokka-rættleiðingina;

23 Til ein pílur slái ígjøgn hansara livur; sum ein fuglur skundar til snerruna, og veit ikki, at tað *er* vegna hansara lív.

24 ¶ Lýðið á meg nú tessvegna, O tit børn, og gáið eftir orðunum av mínum munni.

25 Lat ikki títt hjarta halda undan til hennara vegir, far ikki á strok á hennara gøtur.
26 Tí hon hevur kastað niður margar særdar: ja, mangir sterkir *menn* hava verðið vignir av henni.
27 Hennara hús *er* vegurin til helvitis, farandi niður til kømur deyðans.

KAPITUL 8

RÓPAR ikki vísdómur? og setur ikki kunnleiki fram sína rødd?
2 Hann stendur á toppinum av høgum plássum, við vegin á rásanna plássum.
3 Hann rópar við portrini, við staðarins inngongd, við innkomuna við dyrnar.
4 Innat tykkum, O menn, eg kalli; og mín rødd *er* til mannasonanna.
5 O tit einføldu, skiljið vísdóm: og, tit dárar, verið tit av einum skiljandi hjarta.
6 Hoyrið; tí at eg vil tala um avbær ting; og upplatingin av mínum varrum *skal vera* rætt ting.
7 Tí mín muður skal tala sannleika; og vondska *er* ein andstygd fyri varrum mínum.
8 Øll orðini av mínum munni *eru* í rættvísi; *tað er* einkið rangvørgt ella spilt í teimum.
9 Tey *eru* øll greið fyri honum sum skilur, og rætt fyri teimum ið finna kunnleika.
10 Tak við míni leiðbeining, og ikki silvuri; og kunnleika heldur enn úrvals gulli.
11 Tí at vísdómur *er* betri enn rubīnar; og øll tey ting, ið mega verða tráað, eru ikki at verða sammett við hann.
12 Eg, vísdómur, búgvi *saman* við hygni, og finni útav kunnleika um vitugar uppfinningar.
13 HARRANS ótti *er* at hata ilt: hugmóð, og dramblæti, og hin illa veg, og hin rangvørga munn, hati eg.
14 Ráð *er* mítt, og sunnur vísdómur: eg *eri* skil; eg havi styrki.
15 Við^ mær ríkja kongar, og prinsar løgskipa rættvísi.
16 Við^ mær stjórna prinsar, og aðalsmenn, *enntá* allir dómarar jarðarinnar.
17 Eg elski teir sum elska meg; og teir, sum søkja meg árla, skulu finna meg.
18 Ríkdómar og heiður *eru* hjá mær; *ja,* haldgóðir ríkdómar og rættvísi.
19 Mín ávøkstur *er* betri enn gull, ja, enn fint gull; og mín úrtøka enn úrvals silvur.
20 Eg leiði á vegi rættvísis, á miðjum gøtum dómsins:
21 At eg má elva teimum, sum elska meg, at arva *figgjar*evni; og eg vil fylla teirra skattir.
22 HARRIN átti meg í byrjanini av vegi sínum, áðrenn verk síni í forðum.
23 Eg var settur upp frá ævigtvarandi, frá byrjanini, áður *enn* nakrantíð jørðin varð.
24 Tá ið ongar dýpdir *vóru,* var eg førdur fram; tá ið *tað* ongar keldur *vóru* múgvandi við vatni.
25 Áðrenn fjøllini vóru støðaði, áðrenn heyggjarnar var eg førdur fram:
26 Meðan sum enn *var* hann ei hevði gjørt jørðina, ella akrarnar, ella hin hægsta partin av støvi heimsins.
27 Tá ið hann fyrireikaði himnarnar, eg *var* har: tá ið hann setti ein spannara uppá ásjón dýpdarinnar:
28 Tá ið hann grundfesti skýggini í erva: tá ið hann styrkti keldur djúpsins:
29 Tá ið hann gav til havið sína løgskipan, at vøtnini skuldu ei fara yvirum hans ábjóðan: tá

ið hann ásetti grundvøllir jarðarinnar:
30 Tá var eg hjá honum, *sum* ēin *ið varð* aldur upp *hjá˝ honum:* og eg var dagliga *hansara* fragd, fegnandi altíð frammi fyri honum;
31 Fegnandi í tí íbúgviliga partinum av jørð hansara; og mínar fragdir *vóru* hjá mannasonunum.
32 Nú tessvegna, lýðið á meg, O tit børn: tí at signaðir *eru teir sum* varðveita vegir mínar.
33 Hoyrið leiðbeining, og verið vísir, og avvísið hana ikki.
34 Vælsignaður *er* tann maður sum hoyrir meg, vakandi dagligani við míni portur, bíðandi við stólparnar av mínum hurðum.
35 Tí at hvør*iðso* finnur meg, finnur lív, og skal vinna góðvild av HARRANUM.
36 Men hann, ið syndar ímóti mær, órættar sína egnu sál: allir teir, sum hata meg, elska deyða.

KAPITUL 9

VITSKA hevur bygt sítt hús, hon hevur høgt út stólpar sínar sjey:
2 Hon hevur dripið djór síni; hon hevur blandað vín sítt; hon hevur eisini búgvið borð sítt.
3 Hon hevur sent fram moyggjar sínar: hon rópar uppiá hinum hægstu plássum staðarins,
4 Hvør*iðenn* einfaldur *er,* lat hann venda inn higar: *hvat viðvíkur* honum, sum trýtur skil, hon sigur til hansara,
5 Kom, et av breyði mínum, og drekk av víninum *sum* eg havi blandað.
6 Yvirgevið hinar dársomu, og livið; og gangið á fatanar-vegnum.
7 Hann, sum formanar ein spottara, fær skomm til sín sjálvs: og hann, ið hartar ein vondan *mann, fær* sær sjálvum ein blett.
8 Formana ikki ein spottara, at ikki hann hati teg: harta ein vísan mann, og hann vil elska teg.
9 Gev *leiðbeining* til ein vísan *mann,* og hann vil verða enn vísari: lær ein rættlátan *mann,* og hann vil økjast í lærdómi.
10 HARRANS ótti *er* byrjanin til vísdóm: og kunnleikin til hin heilaga *er* skil.
11 Tí at við^ mær skulu dagar tínir verða margfaldaðir, og árini av tínum lívi skulu verða økt.
12 Um tú veri *teg* vísur, skalt tú vera vísur fyri teg sjálvan: men *um* tú háðart, skalt tú einsamallur bera *tað*.
13 ¶ Ein dársom kvinna *er* málamikil: *hon er* einføld, og veit einkið.
14 Tí hon situr við dyrnar av húsi sínum, á einum stóli í hinum høgu plássum staðarins,
15 At kalla ferðamenn, sum fara beint áfram vegir sínar:
16 Hvør*iðenn* einfaldur *er,* lat hann venda inn higar: og *hvat viðvíkur* honum sum trýtur skil, hon sigur til hansara,
17 Stolin vøtn eru søt; og breyð, *etið* í loynd, er dámligt.
18 Men hann veit ikki, at hinir deyðu *eru* har; *og at* hennara gestir *eru* í dýpdum helvitis.

KAPITUL 10

ORÐTØK Sálomons. Ein vísur sonur ger glaðan faðir: men ein dársamur sonur *er* tyngd móður sínar.
2 Vondsku-dýrgripir gagna einkið: men rættvísi bjargar frá deyða.
3 HARRIN vil ikki loyva sál hins rættvísa at svølta: men hann kastar burtur *figgjar*evni teirra vondu.
4 Hann gerst fátækur, sum fer at *við* eini linari hond: men hond hins ídna ger ríkan.
5 Hann, ið savnar á sumri, *er* ein vísur sonur: *men* hann, sum svevur á heysti, *er* ein sonur sum veldur skomm.

6 Signingar *eru* uppiá høvdi hins rættvísa: men harðskapur dekkar munn teirra vondu.
7 Minni hins rættvísa *er* signað: men navn teirra vondu skal rotna.
8 Hin vísi í hjarta vil taka við boðum: men ein svassandi dári skal falla.
9 Hann, ið gongur reiðiliga, gongur tryggliga: men hann, ið spillir sín veg, skal verða kunnur.
10 Hann, sum blunkar við eyganum, veldur sorg: men ein svassandi dári skal falla.
11 Munnurin hjá einum rættvísum *manni er* ein lívskelda: men harðskapur dekkar munnin hjá tí vonda.
12 Hatur øsir upp trætur: men kærleiki dekkar allar syndir.
13 Í varrunum á honum, sum hevur skil, verður vísdómur funnin: men ein stavur *er* til bakið á honum sum er tómur fyri skil.
14 Vísir *menn* leggja niðurfyri kunnleika: men munnur hinna dársomu *er* nær oyðing.
15 Ríkidømi hins ríka mans *er* sterki staður hans: oyðing hinna fátæku *er* teirra fátækradømi.
16 Strev hins rættvísa *ber* til lívs: ávøkstur hins vonda til synd.
17 Hann *er á* lívsins vegi, sum varðar *um* leiðbeining: men hann, ið vrakar formaning, fer skeivur.
18 Hann, sum fjalir hatur *við* lúgvandi varrum, og hann, sum mælir eitt baktal, *er* ein dári.
19 Í fjøldini av orðum, har vantar ikki synd: men hann, sum aftrar varrar sínar, *er* vísur.
20 Tunga hins rættláta *er sum* úrvals silvur: hjarta teirra vondu *er* lítið vert.
21 Varrar hins rættvísa mata mangar: men dárar doyggja fyri trot á vísdómi.
22 HARRANS signing, hon ger ríkan, og hann leggur afturat onga sorg við tí.
23 *Tað er* sum stuttleiki hjá einum dára at gera mein: men ein skilamaður hevur vísdóm.
24 Ótti hins vonda, hann skal koma uppá hann: men trá teirra rættvísu skal verða veitt.
25 Eins og meldurvindurin fer yvir, soleiðis *er* hin vondi ei *meira:* men hin rættvísi *er* ein ævigtvarandi grundvøllur.
26 Eins og edikur fyri tonnunum, og eins og roykur fyri eygunum, soleiðis *er* letingin fyri teimum ið senda hann.
27 HARRANS ótti framleingir dagar: men ár teirra vondu skulu verða stytt.
28 Vón teirra rættvísu *skal vera* gleði: men eftirvæntan teirra vondu skal týnast.
29 HARRANS vegur *er* styrki til hinna reiðiligu: men oyðing *skal vera* til misgerðar-virkararnar.
30 Hin rættvísi skal aldri verða vikaður: men hinir vondu skulu ikki íbúgva jørðina.
31 Munnur hins rættvísa ber fram vísdóm: men hin rangvørga tunga skal verða skorin út.
32 Varrar hins rættvísa vita hvat er góðtakiligt: men munnur hinna vondu *talar* rangvørgni.

KAPITUL 11

EIN følsk vág *er* andstygd fyri HARRANUM: men ein rættlát vekt *er* hansara fragd.
2 *Tá ið* hugmóð kemur, tá kemur skomm: men hjá hinum lítillátnu *er* vísdómur.
3 Heilleiki hinna reiðiligu skal leiða teir: men spillusemin hjá misbrótarum skal oyða teir.
4 Ríkdómar gagna ikki á degi vreiðinnar: men rættvísi bjargar frá deyða.
5 Rættvísin hjá tí fullkomna skal leiðbeina hansara veg: men hin vondi skal falla við sínum egnu vondsku.
6 Rættvísin hjá teimum reiðiligu skal bjarga teimum: men

misbrótarar skulu verða tiknir í *síni egnu* illavorðni.

7 Tá ið ein vondur maður doyr, skal *hans* eftirvæntan glatast: og vónin hjá órættlátum *monnum* týnist.

8 Hin rættvísi verður útfríaður út úr trongd, og hin vondi kemur í hansara stað.

9 Ein hyklari, við *sínum* munni, oyðileggur næsta sín: men gjøgnum kunnleika skulu hinir rættlátu verða bjargaðir.

10 Tá ið tað gongur væl hjá teimum rættvísu, fegnast býurin: og tá ið hinir vondu týnast, *er* rópan.

11 Við signing hinna reiðiligu verður staðurin upphevjaður: men hann verður kollrendur við munni hinna vondu.

12 Hann, sum er tómur fyri vísdóm, vanvirðir næsta sín: men ein skilamaður heldur friði sínum.

13 Eitt sleygivætti avdúkar loyndarmál: men hann, sum er av einum trúføstum anda, loynir málið.

14 Hvar einkið ráð *er,* fellur fólkið: men í fjøldini av ráðgevarum, *har er* tryggleiki.

15 Hann, sum er veðhald fyri ein fremmandan, skal svíða *fyri tað:* og hann, ið hatar veðhaldsskap, er tryggur.

16 Ein náðisom kvinna afturheldur heiður: og sterkir *menn* afturhalda ríkdómar.

17 Hin náðifulli maðurin ger gott við sína egnu sál: men *hann, sum er* grimmur, órógvar sítt egna hold.

18 Hin vondi virkar eitt svikafult verk: men til hansara, sum sáar rættvísi, *skal vera* eitt trygt endurgjald.

19 Eins og rættvísi *ber* til lívs: soleiðis hann, sum eltir ilt, *eltir tað* til egna deyða sín.

20 Teir, sum eru av einum rangvørgum hjarta, *eru* andstygd fyri HARRANUM: men *slíkir, sum eru* reiðiligir í vegi *sínum, eru* fragd hansara.

21 *Hóast* hond *komi saman* í hond, hinir vondu skulu ei verða órevsaðir: men sáð hinna rættvísu skal verða útfríað.

22 *Sum* ein smúkka av gulli í einum svíns-tríni, *so er* ein vøkur kvinna sum er uttan hygni.

23 Trá teirra rættvísu *er* einans gott: *men* eftirvæntan teirra vondu *er* vreiði.

24 Til er, sum spjaðir, og tó økist; og *til er,* sum afturheldur meir enn er sømiligt, men *tað ber* til fátækradømis.

25 Hin gávumilda sálin skal verða gjørd feit: og hann, sum vatnar, skal verða vatnaður eisini sjálvur.

26 Hann, ið afturheldur korn, fólkið skal banna hann: men signing *skal vera* uppiá høvdinum hjá honum sum selur *tað.*

27 Hann, sum dúgligani søkir gott, útvegar tokka: men hann, ið søkir mein, tað skal koma at honum.

28 Hann, sum troystar á ríkdómar sínar, skal falla: men hinir rættvísu skulu blómka sum ein grein.

29 Hann, ið órógvar sítt egna hús, skal arva vindin: og dárin *skal vera* tænari fyri tí hjartavísa.

30 Ávøkstur hins rættvísa *er* eitt lívstræ; og hann, ið vinnur sálir, *er* vísur.

31 Sí, hin rættvísi skal verða endurgoldin á jørðini: nógv meira hin vondi og syndarin.

KAPITUL 12

HVØRIÐENN elskar leiðbeining, elskar kunnleika: men hann, ið hatar formaning, *er* óskynskur.

2 Ein góður *maður* vinnur góðvild av HARRANUM: men ein mann av vondum snildarráðum vil hann fordøma.

3 Ein maður skal ei verða grundfestur við vondsku: men rót teirra rættvísu skal ei verða flutt.

4 Ein dygdsom kvinna *er* ein krúna fyri ektamanni sínum: men hon, sum ger til skammar, *er* sum rot í beinum hansara.

5 Hugsanir hinna rættvísu *eru* rættar: *men* ráð teirra vondu *eru* svik.

6 Orð hinna vondu *eru* at liggja á lúri eftir blóði: men munnur teirra reiðiligu skal útfría teir.

7 Hinir vondu verða kollrendir, og *eru* ikki: men hús teirra rættvísu skal standast.

8 Ein maður skal verða viðmæltur samsvarandi við vísdóm sín: men hann, sum er av einum spiltum hjarta, skal verða vanvirdur.

9 *Hann, sum er* vanvirdur, og hevur ein tænara, *er* betri enn hann, sum ærar seg sjálvan, og vantar breyð.

10 Ein rættvísur *maður* gevur gætur eftir lívi djórs síns: men hinar eymu miskunnir hinna vondu *eru* grimmar.

11 Hann, ið veltir jørð sína, skal verða mettaður við breyði: men hann, sum fylgir fáfongdum *persónum, er* tómur fyri skil.

12 Hin vondi tráar garnið hjá óndum *monnum:* men rót teirra rættvísu veitir *ávøkst*.

13 Hin vondi verður snerraður við misbroti varra *sína:* men hin rættvísi skal koma út úr trongd.

14 Ein maður skal verða mettaður við góðum við ávøksti munns *síns:* og endurgjaldið av hondunum hjá einum manni skal verða rindað honum.

15 Vegurin hjá einum dára *er* rættur í egnu eygum hans: men hann, sum lýður á ráð, *er* vísur.

16 Vreiðin hjá einum dára er í stundini kunn: men ein hyggin *maður* hylur skomm.

17 *Hann, sum* talar sannleika, sýnir fram rættvísi: men eitt falskt vitni svik.

18 Til er, sum talar eins og gatingin av einum svørði: men tunga teirra vísu *er* heilsa.

19 Sannleikans vørr skal verða grundfest um ævir: men ein lúgvandi tunga *er* bert í eitt bil.

20 Svik *er* í hjartanum á teimum sum ímynda ilt: men til ráðgevar friðarins *er* frøi.

21 Tað skal einkið ilt henda fyri hin rættláta: men hin vondi skal verða fyltur við meini.

22 Lúgvandi varrar *eru* andstygd fyri HARRANUM: men teir, sum handla sannligani, *eru* hansara fragd.

23 Ein hyggin maður loynir kunnleika: men hjartað á dárum kunnger dárskap.

24 Hond hinna ídnu skal hava stjórn: men hin lati skal vera undir íkasti.

25 Tyngd í hjartanum á manni fær tað *at* húka: men eitt gott orð ger tað glatt.

26 Hin rættvísi *er* meiri avbærur enn sín næsti: men vegur teirra vondu tølir teir.

27 Hin lati *maðurin* steikir ikki tað sum hann tók inn *í* veiðu: men *fíggjar*evnið hjá einum ídnum manni *er* dýrabært.

28 Á vegi rættvísis *er* lív; og *á* rásini *harhjá, har er* eingin deyði.

KAPITUL 13

EIN vísur sonur *hoyrir* leiðbeining faðirs síns: men ein spottari hoyrir ikki hartan.

2 Ein maður skal eta gott av ávøksti munns *síns:* men sálin hjá misbrótarunum *skal eta* harðskap.

3 Hann, ið varðar sín munn, varðar sítt lív: *men* hann, sum opnar vítt sínar varrar, skal hava oyðing.

4 Sálin hjá letinginum tráar, og

hevur einkið: men sál teirra ídnu skal verða gjørd feit.

5 Ein rættvísur *maður* hatar lúgving: men ein vondur *maður* er vamlisligur, og kemur til skammar.

6 Rættvísi varðar *hann, sum er* reiðiligur í veginum: men vondska kollrennur syndaran.

7 Til er, sum ger seg sjálvan ríkan, tó einkið *hevur: til er,* sum ger seg sjálvan fátækan, tó *hevur* miklar ríkdómar.

8 Loysigjaldið av lívi mans *eru* ríkdómar hans: men hin armi hoyrir ikki hartan.

9 Ljós teirra rættvísu fegnast: men lampa teirra vondu skal verða sløkt.

10 Einans viðˆ hugmóði kemur trætnaður: men hjá hinum væl ráðfordu *er* vísdómur.

11 Ríkidømi, *fingið* við fáfongd, skal verða minkað um: men hann, sum savnar við strevi, skal taka til.

12 Vón, sett út, ger hjartað sjúkt: men *tá ið* tráin kemur, *er tað* eitt lívstræ.

13 Hvør*ið*so vanvirðir orðið, skal verða oyddur: men hann, sum óttast boðið, skal verða endurgoldin.

14 Lóg hins vísa *er* ein lívskelda, at víkja frá snerrum deyðans.

15 Gott skil gevur góðtokka: men vegurin hjá misbrótarum *er* harður.

16 Hvør *ēin* hyggin *maður* fer fram við kunnleika: men ein dári leggur opnan *sín* dárskap.

17 Ein vondur sendisveinur fellur inn í mein: men ein trúfastur umboðsmaður *er* heilsa.

18 Armóð og skomm *skulu vera til* hansara sum havnar leiðbeining: men hann, sum gevur gætur eftir formaning, skal verða ærdur.

19 Tráanin fullførd er søt fyri sálini: men *tað er* andstygd fyri dárum at víkja frá illum.

20 Hann, sum gongur við vísum *monnum,* skal verða vísur: men ein lagsbróðir hjá dárum skal verða oyddur.

21 Ilt eltir syndarar: men til hin rættvísa skal gott verða endurgoldið.

22 Ein góður *maður* eftirletur ein arv til barnabarna sína: og ríkidømi syndarans *er* lagt niðurfyri til hin rættvísa.

23 Nógv føði *er í* velting hinna ørmu: men til er, *sum verður* oyddur vegna trot á dómi.

24 Hann, sum sparar stav sín, hatar son sín: men hann, ið elskar hann, agar hann betíðs.

25 Hin rættvísi etur til mettingina av síni sál: men búki teirra vondu skal fattast.

KAPITUL 14

HVØR *ēin* vís kvinna byggir hús sítt: men hin dársama rívur tað niður við hondum sínum.

2 Hann, sum gongur í reiðiligleika sínum, óttast HARRAN: men *hann, ið er* spiltur í vegum sínum, vanvirðir hann.

3 Í munni hins dársama *er* ein stavur av hugmóð: men varrar teirra vísu skulu varðveita teir.

4 Har eingir oksar *eru, er* krubban rein: men nógvur gróður *er* viðˆ styrki oksans.

5 Eitt trúfast vitni vil ikki lúgva: men eitt falskt vitni vil mæla lygnir.

6 Ein spottari søkir vísdóm, og *finnur hann* ikki: men kunnleiki *er* nemmur hjá honum sum skilur.

7 Far frá nærveruni av einum fávitskutum manni, tá ið tú ei varnarst *í honum* kunnleikans varrar.

8 Vísdómur hins hygna *er* at skilja sín veg: men dárskapurin hjá dárum *er* svik.

9 Dárar gera eina háðan eftir

synd: men hinna rættvísu millum, *har er* tokki.
10 Hjartað kennir sín egna beiskleika; og ein fremmandur blandar seg ikki uppí hansara frøi.
11 Hús teirra vondu skal verða hvølvt: men tabernakkul teirra reiðiligu skal blómka.
12 Til er ein vegur sum tykist rættur hjá einum manni, men endin hará *eru* vegir deyðans.
13 Enntá í látri er hjartað syrgið; og endin á hasum kætinum *er* tyngd.
14 Fráfallarin í hjarta skal verða fyltur við egnu vegum sínum: og ein góður maður *skal verða mettaður* frá sjálvum sær.
15 Hin einfaldi trýr hvørjum orði: men hin hygni *maðurin* hyggur væl til sína gongd.
16 Ein vísur *maður* óttast, og víkur frá illum: men dárin leikar í, og er mótsamur.
17 *Hann, ið* skjótt *verður* firtin, handlar fávitskuliga: og ein maður av vondum uppáfundum verður hataður.
18 Hinir einføldu arva dárskap: men hinir hygnu eru krýndir við kunnleika.
19 Hinir illu lúta frammi fyri hinum góðu; og hinir vondu við portur hins rættvísa.
20 Hin fátæki er hataður sjálvt av sínum egna næsta: men hin ríki *hevur* nógvar vinir.
21 Hann, ið vanvirðir næsta sín, syndar: men hann, ið hevur miskunn á hinar ørmu, fegin *er* hann.
22 Fara ikki teir skeivir, sum upphugsa ilt? men miskunn og sannleiki *skulu vera* til teirra, sum upphugsa gott.
23 Í øllum strevi er vinningur: men varranna tos *ber* einans til armóðar.
24 Krúna hinna vísu *er* teirra ríkdómar: *men* dárskapurin hjá dárum *er* dársemi.
25 Eitt satt vitni bjargar sálum: men eitt svikafult *vitni* talar lygnir.
26 Í HARRANS ótta *er* sterkt mót: og hansara børn skulu hava eitt stað av skjóli.
27 HARRANS ótti *er* ein lívskelda, at víkja frá snerrum deyðans.
28 Í fjøldini av fólki *er* kongsins heiður: men í trotinum á fólki *er* prinssins oyðing.
29 *Hann, ið er* seinur til vreiðis, *er* av miklum skili: men *hann, sum er* skundigur av anda, upphevjar dárskap.
30 Eitt heilnæmt hjarta *er* lív holdsins: men øvund er rot beinanna.
31 Hann, ið kúgar hin fátæka, spottar Skapara hans: men hann, ið heiðrar hann, hevur miskunn á hin fátæka.
32 Hin vondi verður rikin burtur í vondsku síni: men hin rættvísi hevur vón í deyða sínum.
33 Vísdómur hvílir í hjartanum hjá honum sum hevur skil: men *tað, sum er* í miðjuni á dárum, er gjørt kunnugt.
34 Rættvísi hevjar eina tjóð: men synd *er* ein skomm hjá einumhvørjum fólki.
35 Kongsins góðtokki *er* mótvegis einum vísum tænara: men hansara vreiði er *ímóti* honum ið veldur skomm.

KAPITUL 15

EITT eymt svar vendir burtur vreiði: men hervilig orð øsa upp øði.
2 Tunga teirra vísu brúkar kunnleika á rættan *hátt:* men munnurin hjá dárum hellir út dárskap.
3 HARRANS eygu *eru* á hvørjum plássi, skoðandi hinar óndu og hinar góðu.
4 Ein heilnom tunga *er* eitt lívstræ: men spillusemi harí *er* ein brestur í andanum.

5 Ein dári vanvirðir rættleiðing faðirs síns: men hann, ið gevur gætur eftir formaning, er hyggin.
6 Í húsi hins rættvísa *er* nógvur dýrgripur: men í úrkomunum hjá teimum vondu er trongd.
7 Varrar teirra vísu breiða út kunnleika: men hjarta hinna dársomu *ger* ikki so.
8 Sláturoffur hinna vondu *er* ein andstygd fyri HARRANUM: men bøn teirra reiðiligu *er* hansara fragd.
9 Vegur teirra vondu *er* ein andstygd yvirfyri HARRANUM: men hann elskar hann sum fylgir eftir rættvísi.
10 Rættleiðing *er* svárlig at honum sum yvirgevur vegin: *og* hann, sum hatar formaning, skal doyggja.
11 Helviti og oyðing *eru* frammi fyri HARRANUM: hvør mikið meira tá hjørtu mannabarnanna?
12 Ein spottari elskar ikki ein sum formanar hann: eiheldur vil hann fara til hinna vísu.
13 Eitt kátt hjarta ger eina frødliga ásjón: men við hjartasorg er andin brotin.
14 Hjartað hjá honum, sum hevur skil, søkir kunnleika: men muðurin hjá dárum matar *sær* á fávitsku.
15 Allir dagar hins nívda *eru* illir: men hann, sum er av einum kátum hjarta, *hevur* eina framhaldandi fest.
16 Betri *er* lítið við HARRANS ótta enn mikil skattur og trongd afturvið.
17 Betri *er* ein verður av urtum, har kærleiki er, enn ein stallaður oksi og hatur afturvið.
18 Ein vreiðifullur maður øsir upp stríð: men *hann, sum er* seinur til øði, sissar stríð.
19 Vegur hins lata *mans er* eins og ein girðing av tornum: men vegur hinna rættvísu *er* gjørdur greiður.
20 Ein vísur sonur ger glaðan faðir: men ein dársamur maður vanvirðir sína móður.
21 Dárskapur *er* frøi fyri *honum sum er* sørur fyri vísdóm: men ein skilamaður gongur reiðiliga.
22 Uttan ráð verða ætlanir vónsviknar: men í fjøldini av ráðgevarum verða tær grundfestar.
23 Ein maður hevur gleði við svarinum av munni sínum: og eitt orð, *talað* í rættari tíð, hvør gott *er tað!*
24 Lívsins vegur *er* í erva hjá tí vísa, at hann má víkja frá helviti í neðra.
25 HARRIN vil oyðileggja hús hinna hugmóðigu: men hann vil grundfesta markaskjal einkjunnar.
26 Hugsanir hins vonda *eru* ein andstygd fyri HARRANUM: men *orðini* hjá teimum skíru *eru* dámlig orð.
27 Hann, ið er grádigur um vinning, órógvar egna hús sítt; men hann, ið hatar gávur, skal liva.
28 Hjarta hins rættvísa studerar at svara: men muður teirra vondu stoytir út ill ting.
29 HARRIN *er* fjart frá hinum vondu: men hann hoyrir bøn teirra rættvísu.
30 Eygnanna ljós ger hjartað fegið: *og* ein góð fráboðan ger beinini feit.
31 Tað oyra, sum hoyrir lívsins formaning, verður *verandi* hinna vísu millum.
32 Hann, ið havnar leiðbeining, vanvirðir sína egnu sál: men hann, ið hoyrir formaning, fær skil.
33 HARRANS ótti *er* leiðbeining vísdómsins; og undan heiðuri *er* eyðmýkt.

KAPITUL 16

FYRIREIKINGAR hjartans í manni, og svar tungunnar, *er* frá HARRANUM.

2 Allir vegirnir hjá einum manni *eru* reinir í egnu eygum hans; men HARRIN vigar andarnar.

3 Lít verk tíni HARRANUM til, og tínar hugsanir skulu vera grundfestar.

4 HARRIN hevur gjørt øll *ting* til sín sjálvs: ja, sjálvt hin vonda til ilskunnar dag.

5 Hvør tann, *sum er* stoltur í hjarta, *er* ein andstygd fyri HARRANUM: *hóast* hond *komi saman* í hond, skal hann ei verða órevsaður.

6 Við^ miskunn og sannleika er misgerð reinskað: og við^ HARRANS ótta víkja *menn* frá illum.

7 Tá ið vegirnir hjá einum manni toknast HARRANUM, fær hann sjálvt hansara figgindar at vera í friði við hann.

8 Betri *er* eitt sindur við rættvísi, enn miklar inntøkur uttan rætt.

9 Hjartað hjá einum manni upphugsar hansara veg: men HARRIN leiðbeinir hansara fet˘.

10 Ein guddómligur setningur *er* í varrunum hjá kongi: hansara muður misbrýtur ikki í dómi.

11 Ein røtt vekt og vág *eru* HARRANS: øll sekkjarins lodd *eru* verk hans.

12 *Tað er* ein andstygd hjá kongum at fremja vondsku: tí at hásætið verður grundfest við rættvísi.

13 Rættvísar varrar *eru* fragdin hjá kongum; og teir elska hann sum talar rætt.

14 Vreiðin hjá einum kongi *er eins og* deyðs-sendisveinar: men ein vísur maður vil sissa hana.

15 Í ljósinum av kongsins ásjón *er* lív; og hansara góðvild *er* eins og eitt skýggj av tí seinna regninum.

16 Hvør mikið betri *tað er* at fáa vísdóm enn gull! og at fáa skil heldur at verða valt enn silvur!

17 Alfaravegur hinna reiðiligu *er* at víkja frá illum: hann, ið varðar sín veg, varðveitir sál sína.

18 Hugmóð *fer* undan oyðing, og ein hástórur andi undan einum falli.

19 Betri *er at vera* av einum eyðmjúkum anda við hinum lítillátnu, enn at deila fongin við hinum stoltu.

20 Hann, ið handfer eitt mál vísliga, skal finna gott: og hvør*ið*so lítur á HARRAN, sælur *er* hann.

21 Hin vísi í hjarta skal verða kallaður hyggin: og varranna søtsemi økir um lærdóm.

22 Skil *er* eitt lívskeldulop hjá honum ið hevur tað: men leiðbeining dára˘ *er* dárskapur.

23 Hjartað hjá tí vísa lærir hansara munn, og leggur afturat lærdóm til hansara varrar.

24 Hugnalig orð *eru sum* ein hunangskøka, søt fyri sálini, og heilsa fyri beinunum.

25 Tíl er ein vegur sum tykist rættur hjá einum manni, men endin hará *eru* vegir deyðans.

26 Hann, ið strevast, strevast fyri seg sjálvan; tí hansara munnur bønar tað av honum.

27 Ein ógudiligur maður grevur upp ilt: og í hansara varrum *er* sum ein brennandi eldur.

28 Ein rangvørgur maður sáar stríð: og ein teskari atskilur aðal vinir.

29 Ein harðligur maður lokkar sín næsta, og leiðir hann inn á tann veg *sum* ikki *er* góður.

30 Hann lokar síni eygu til at upphugsa rangvørg ting: flytandi sínar varrar, fær hann ilt at bera á.

31 Tað gráa høvdið *er* ein dýrdar krúna, *um* tað verði funnið á vegi rættvísis.

32 *Hann, ið er* seinur til firtnis, *er* betri enn hin mektigi; og hann, ið stjórnar anda sínum, enn hann sum tekur ein stað.

33 Luturin verður kastaður inn í fangið; men øll raðsetingin harav *er* av HARRANUM.

KAPITUL 17

BETRI *er* ein turrur biti, og kvirra afturvið, enn eitt hús fult av sláturofrum *við* stríði.

2 Ein vísur tænari skal hava stjórn yvir einum syni sum veldur skomm, og skal hava part av arvinum millum brøðranna.

3 Edlingargrýtan *er* til silvur, og bræðsluovnurin til gull: men HARRIN roynir hjørtuni.

4 Ein vondur gerari gevur gætur eftir følskum vørrum; *og* ein lygnari lænir oyra til eina illavorðna tungu.

5 Hvør*iðso* spottar hin fátæka, vanærir Skapara hans: *og* hann, ið er glaður yvir skaðatilburðir, skal ikki verða órevsaður.

6 Barnabørn *eru* krúnan hjá gomlum monnum; og dýrdin hjá børnum *eru* teirra fedrar.

7 Frábær tala sømir ikki einum dára: mikið minni lúgvandi varrar einum prinsi.

8 Ein gáva *er sum* ein dýrabærur steinur í eygunum á honum ið hevur hana: hvagarsumhelst *ið* hon vendir, framgongur hon.

9 Hann, sum dekkar eitt misbrot, søkir kærleika; men hann, sum endurtekur eina søk, skilur *sjálvastar* vinir.

10 Ein átala inngongur meir inn í ein vísan mann enn hundrað fleingjur inn í ein dára.

11 Ein óndur *maður* søkir einans uppreist: tí skal ein grimmur sendisveinur verða sendur ímóti honum.

12 Lat eina bjørn, rænd fyri hvølpar sínar, møta einum manni, heldur enn ein dári í sínum dárskapi.

13 Hvør*iðso* endurrindar ilt fyri gott, ilt skal ikki víkja frá húsi hansara.

14 Byrjanin til stríð *er sum* tá ið ein letur út vatn: tessvegna lætt av trætnaði, áðrenn hann verði fingin við.

15 Hann sum rættvísger hin vonda, og hann ið fordømir hin rættláta, enntá teir báðir *eru* andstygd fyri HARRANUM.

16 Hví *er* ein prísur í hondini á einum dára til at fáa vísdóm, eftirsum *hann* einkið hjarta *hevur til tess?*

17 Ein vinur elskar til allar tíðir, og ein bróðir er føddur til mótburð.

18 Ein maður, tómur fyri skil, tekst í hendur, *og* gerst veðhald í nærveru vinar síns.

19 Hann elskar misbrot, sum elskar stríð: *og* hann, sum hevjar sítt portur, søkir oyðing.

20 Hann, sum hevur eitt rangvørgt hjarta, finnur einkið gott: og hann, sum hevur eina spilta tungu, fellur inn í mein.

21 Hann, sum gitur ein dára, *ger tað* til sorg sína: og faðirin hjá einum dára hevur onga gleði.

22 Eitt kátt hjarta ger gott *sum* ein heiliváður: men ein brotin andi turkar beinini.

23 Ein vondur *maður* tekur eina gávu út úr barminum til at spilla dóms-vegirnar.

24 Vísdómur *er* frammi fyri honum sum hevur skil; men eyguni hjá einum dára *eru* í endum jarðarinnar.

25 Ein dársamur sonur *er* ein harmur fyri faðir sínum; og beiskleiki fyri henni sum føddi hann.

26 Eisini at revsa hin rættláta *er* ikki gott, *ella* at slá prinsar fyri rættferð.

27 Hann, ið hevur kunnleika, sparir síni orð: *og* ein skilamaður er av einum avbærum anda.

28 Enntá ein dári, tá ið hann heldur friði sínum, verður roknaður vísur: *og* hann, ið lokar varrar sínar, *verður mettur at vera* ein skilamaður.

KAPITUL 18

GJØGNUM tráan, ein maður, havandi atskilt seg sjálvan, søkir *og* blandar *seg* uppí við øllum vísdómi.

2 Ein dári hevur onga fragd í skili, uttan at hansara hjarta má avdúka seg sjálvt.

3 Tá ið hin vondi kemur, *tá* kemur eisini vanvirðing, og við vanærisligsemi skomm.

4 Orðini av munninum hjá einum manni *eru sum* djúp vøtn, *og* vísdómsins keldulop *sum* ein fløðandi áarløkur.

5 *Tað er* ikki gott at taka ímóti persóni hins vonda, at kollrenna hinar rættvísu í dómi.

6 Varrarnar hjá einum dára innfara inn í trætnað, og hansara munnur kallar eftir sløgum.

7 Munnurin hjá einum dára *er* oyðing hans, og hansara varrar *eru* snerran hjá hansara sál.

8 Orðini hjá einum søgubera *eru* sum sárˇ, og tey fara niður í hinar innastu partar av búkinum.

9 Hann eisini, sum er latur í arbeiði sínum, er bróðir at honum sum er ein mikil oyðslari.

10 HARRANS navn *er* eitt sterkt torn: hin rættvísi rennur inn í tað, og er tryggur.

11 Ríkidømi hins ríka mans *er* sterki staður hans, og sum ein høgur múrur í egna innbilni hans.

12 Áðrenn oyðing er hjartað hjá einum manni hástórt, og undan heiðuri *er* eyðmýkt.

13 Hann, sum svarar eini søk, áðrenn hann hoyrir *hana,* tað *er* dárskapur og skomm at honum.

14 Halda uppi hansara veikleika vil andin hjá einum manni; men ein særdan anda hvør kann bera?

15 Hjarta hins hygna skaffar kunnleika; og oyra hinna vísu søkir kunnleika.

16 Gávan hjá einum manni ger rúm fyri honum, og førir hann framfyri miklar menn.

17 *Hann, sum er* fyrstur í síni egnu søk, *tykist* rættlátur; men hansara næsti kemur og kannar hann.

18 Luturin veldur trætnaðum at halda uppat, og skilur ímillum hinar mektigu.

19 Ein bróðir, meinbogaður, *er verri at verða vunnin* enn ein sterkur staður: og *teirra* trætnaðir *eru* sum stengurnar á einum slotti.

20 Búkurin hjá einum manni skal verða mettaður við fruktini av hansara munni; *og* við ávøksti varra sína skal hann verða fyltur.

21 Deyði og lív *eru* í tungunnar valdi: og teir, sum elska hana, skulu eta fruktina av henni.

22 *Hvøriðso* finnur ektakonu, finnur eitt gott *ting,* og vinnur góðtokka av HARRANUM.

23 Hin fátæki brúkar nølanir; men hin ríki svarar knortlasliga.

24 Ein maður, *sum hevur* vinir, má sýna seg vinaligan: og til er ein vinur *sum* hongur tættari *við* enn ein bróðir.

KAPITUL 19

BETRI *er* hin fátæki, sum gongur í heilleika sínum, enn *hann sum er* spiltur í varrum sínum, og er ein dári.

2 Eisini *at* sálin *veri* uttan kunnleika, *tað er* ikki gott; og hann, sum skundar við fótum *sínum,* syndar.

3 Dárskapurin hjá manni spillir hansara veg: og hansara hjarta ergrast ímóti HARRANUM.

4 Ríkidømi skapar nógvar vinir; men hin fátæki er atskildur frá næsta sínum.

5 Eitt falskt vitni skal ei verða órevsað, og *hann, sum* talar lygnir, skal ikki komast undan.

6 Mangir vilja bøna um yndi prinssins: og hvør *ein* maður *er*

ein vinur fyri honum sum gevur gávur.

7 Allir brøðurnir hjá tí fátæka hata hann: hvør mikið meira fara hansara vinir fjart frá honum? hann eltir *teir við* orðum, *tó eru* teir vantandi *hjá honum*.

8 Hann, ið vinnur vísdóm, elskar sína egnu sál: hann, ið varðar *um* skil, skal finna gott.

9 Eitt falskt vitni skal ei verða órevsað; og *hann, sum* talar lygnir, skal týnast.

10 Fragd er ikki sømilig hjá einum dára; mikið minni hjá einum tænara at hava stjórn yvir prinsum.

11 Hygnin hjá einum manni útsetur hansara firtni; og *tað er* hansara heiður at umleypa eitt misbrot.

12 Kongsins vreiði *er* sum ýlingin av eini leyvu; men hansara góðtokki *er* sum døggin uppiá grasinum.

13 Ein dársamur sonur *er* skaðatilburður faðirs hansara: og trætnaðirnir av einum vívi *eru* ein støðug drypping.

14 Hús og ríkidømir *eru* arvur fedra: og ein hyggin ektakona *er* frá HARRANUM.

15 Letiskapur kastar inn í ein djúpan svøvn; og ein yrkisleys sál skal líða hungur.

16 Hann, sum varðveitir boðið, varðveitir sína egnu sál; *men* hann, sum vanvirðir vegir sínar, skal doyggja.

17 Hann, sum hevur várkunn yvir hin fátæka, lænir HARRANUM; og tað, sum hann hevur givið, vil hann gjalda honum aftur.

18 Aga son tín, meðan vón er, og lat ikki tína sál spara fyri grát hansara.

19 Ein maður av miklari vreiði skal líða revsing: tí um tú útfríi *hann,* tó mást tú gera tað aftur.

20 Hoyr tilráðing, og tak við leiðbeining, at tú mást vera vísur í tí seinna enda tínum.

21 *Tað eru* mong snildarráð í hjartanum hjá einum manni; hóast hetta, HARRANS ráð, tað skal standast.

22 Tráin hjá einum manni *er* blídni hans: og ein fátækur maður *er* betri enn ein lygnari.

23 HARRANS ótti *ber* til lívs: og *hann, sum hevur hann,* skal verða verandi mettaður; hann skal ikki verða vitjaður við illum.

24 Ein latur *maður* fjalir hond sína í barmi *sínum,* og vil ikki so mikið sum føra hana til munn sín aftur.

25 Slá ein spottara, og hin einfaldi vil vera varin: og formana ēin sum hevur skil, *og* hann vil skilja kunnleika.

26 Hann, sum oyðir faðir *sín, og* eltir burt *sína* móður, *er* ein sonur sum veldur skomm, og ber vanæru.

27 Halt uppat, sonur mín, at hoyra leiðbeiningina *sum veldur* at fara skeivum frá kunnleikans orðum.

28 Eitt ógudiligt vitni spottar dóm: og munnur hinna vondu uppslúkar misgerð.

29 Dómar eru fyrireikaðir til spottarar, og fleingjur til ryggin á dárum.

KAPITUL 20

VÍN *er* ein spottari, sterkur drykkur *er* rasandi: og hvørsumhelst *ið* er tøldur við tí er ikki vísur.

2 Óttin fyri einum kongi *er* sum ýlið av eini leyvu: *hvøriðso* tirrar hann til firtnis, syndar *ímóti* egnu sál síni.

3 *Tað er* ein heiður hjá einum manni at halda uppat frá stríði: men hvør *ēin* dári vil blanda seg *uppí*.

4 Letingin vil ikki pløga uppá grund av kuldanum; *tí* skal hann bidda á heysti, og einkið *hava*.

5 Ráð í hjartanum hjá manni *er eins og* djúpt vatn; men ein skilamaður vil draga tað *upp*úr.

6 Flestir menn vilja kunngera hvør *og* ēin sína egnu góðsku: men ein trúfastan mann, hvør kann finna *hann?*

7 Hin rættláti *maðurin* gongur í heilleika sínum: hansara børn *eru* vælsignað eftir hann.

8 Ein kongur, sum situr í dómstrónuni, spjaðir burtur alt ilt við eygum sínum.

9 Hvør kann siga, Eg havi gjørt hjarta mítt reint, eg eri skírur frá synd míni?

10 Ymis lodd, *og* ymis mál, bæði av teimum *eru* álík andstygd fyri HARRANUM.

11 Sjálvt eitt barn kennist av gerningum sínum, hvørt hansara verk *veri seg* skírt, og hvørt *tað veri seg* rætt.

12 Hitt hoyrandi oyra, og hitt síggjandi eyga, HARRIN hevur gjørt enntá bæði av teimum.

13 Elska ikki svøvn, at ikki tú komi til armóð; opna tíni eygu, *og* tú skalt verða mettaður við breyði.

14 *Tað er* einkið, *tað er* einkið, sigur keyparin: men tá ið hann er farin sín veg, tá reypar hann.

15 Til er gull, og ein fjøld av rubīnum: men kunnleikans varrar *eru* ein dýrabær smúkka.

16 Tak hansara klæði, sum er veðhald *fyri* ein fremmandan: og tak eitt pant av honum fyri eina fremmanda kvinnu.

17 Falssemis breyð *er* søtt fyri einum manni; men aftaná skal hansara munnur verða fyltur við grúsi.

18 *Hvør* ætlan verður grundfest við ráði: og við góðari ráðføring før kríggj.

19 Hann, sum gongur um *sum* ein søguberi, opinberar loyndarmál˘: tessvegna fást ikki við hann sum smikrar við varrum sínum.

20 Hvør*iðso* bannar faðir sín, ella móður sína, hansara lampa skal verða sløkt í bølamyrkri.

21 Ein arvur *kann verða* fingin skundisligani at byrja við; men endin hará skal ikki vera signað-ur.

22 Sig ikki tú, Eg vil endurgjalda ilt; *men* bíða eftir HARRANUM, og hann skal frelsa teg.

23 Ymis lodd *eru* ein andstygd yvirfyri HARRANUM; og ein følsk vágskál *er* ikki góð.

24 Gongdirnar hjá manni *eru* av HARRANUM; hvussu kann ein maður tá skilja sín egna veg?

25 *Tað er* ein snerra fyri tí manni *sum* gloypir *tað sum er* heilagt, og síðan heitir at halda avhoyring.

26 Ein vísur kongur spjaðir hinar vondu, og førir hjólið yvir teir.

27 Mansins andi *er* kerti HARRANS, kannandi allar hinar innvortis partarnar av búkinum.

28 Miskunn og sannleiki varðveita kongin: og hans hásæti verður uppihildið við^ miskunn.

29 Ungmanna dýrd *er* teirra styrki: og vakurleikin hjá gomlum monnum *er* tað gráa høvdið.

30 Bláleikin av einum sári reinsar burt ilt: soleiðis *gera eisini* fleingjur hinar innvortis partarnar av búkinum.

KAPITUL 21

KONGSINS hjarta *er* í HARRANS hond, *sum* løkirnir av vøtnum: hann vendir tí hvagarsumhelst hann vil.

2 Hvør vegur hjá einum manni *er* rættur í hans egnu eygum: men HARRIN umhugsar hjørtuni.

3 At inna rættlæti og dóm *er* meiri góðtakiligt fyri HARRANUM enn sláturoffur.

4 Eitt høgt eygnabrá, og eitt stolt hjarta, *og* pløging teirra vondu, *er* synd.

5 Hugsanir hinna ídnu *bera* einans til ríkiligleika; men hjá hvørjum tí, *sum er* skundigur, einans til trot.

6 Skaffingin av skattum við eini lúgvandi tungu *er* ein fáfongd, syft aftur og fram av teimum sum søkja deyða.

7 Ræning teirra vondu skal oyða teir; av tí at teir sýta at inna dóm.

8 Vegurin hjá manni *er* rangvørgur og fremmandur: men *hvat* hinum skíra *viðvíkur,* hansara verk *er* rætt.

9 *Tað er* betri at búgva í einum horni av húsatoppinum, enn við eini klandrandi kvinnu í einum víðum húsi.

10 Sál hins vonda tráar ilt: hansara næsti finnur ongan tokka í eygum hans.

11 Tá ið spottarin verður revsaður, verður hin einfaldi gjørdur vísur: og tá ið hin vísi verður undirvístur, tekur hann við kunnleika.

12 Hin rættvísi *maðurin* vísliga umhugsar hús hins vonda: *men Guð* kollrennur hinar vondu fyri *teirra* vondsku.

13 Hvør*iðso* tippir síni oyru fyri rópi hins fátæka, hann eisini skal rópa sjálvur, men skal ei verða hoyrdur.

14 Ein gáva í loynd stillir firtni: og eitt endurgjald í barmin sterka vreiði.

15 *Tað er* gleði hjá tí rættláta at inna dóm: men oyðing *skal vera* til misgerðar-virkararnar.

16 Tann maður, sum reikar út av vitskunnar vegi, skal verða verandi í samkomu teirra deyðu.

17 Hann, ið elskar njóting, *skal vera* ein fátækur maður: hann, ið elskar vín og olju, skal ikki verða ríkur.

18 Hin vondi *skal vera* eitt loysigjald fyri hin rættvísa, og misbrótarin fyri hin reiðiliga.

19 *Tað er* betri at búgva í oyðuni, enn við eini klandursamari og eini firtnari kvinnu.

20 *Til er* dýrgripur at verða tráaður og olja í býli hins vísa; men ein fávitskutur maður brúkar tað upp.

21 Hann, ið fylgir eftir rættvísi og miskunn, finnur lív, rættvísi, og heiður.

22 Ein vísur *maður* klintrar stað hinna mektigu, og kastar niður styrkina av treystinum harhjá.

23 Hvør*iðso* varðar sín munn og sína tungu, varðar sína sál frá trongdum.

24 Stoltur *og* hástórur spottari *er* navn hansara sum handlar í stoltari vreiði.

25 Tráin hjá tí lata drepur hann; tí at hans hendur sýta at streva.

26 Hann grádigani girnast allan dagin langan: men hin rættvísi gevur og sparir ikki.

27 Sláturoffur teirra vondu *er* andstygd: hvør mikið meira *tá ið* hann kemur við tí við einum vondum huga?

28 Eitt falskt vitni skal týnast: men tann maðurin, sum hoyrir, talar støðugt.

29 Ein vondur maður herðir sítt andlit: men *hvat* tí reiðiliga *viðvíkur,* hann leiðbeinir sín veg.

30 *Til er* eingin vísdómur, ella skil, ella ráð, ímóti HARRANUM.

31 Hesturin *er* fyribúgvin ímóti bardagadeginum: men tryggleiki *er* av HARRANUM.

KAPITUL 22

EITT *gott* navn *er* heldur at verða valt enn miklir ríkdómar, *og* elskandi góðvild heldur enn silvur og gull.

2 Hin ríki og fátæki hittast tilsaman: HARRIN *er* skaparin av teim øllum.

3 Ein hyggin *maður* fyrisær hitt

illa, og fjalir seg: men teir einføldu fara áfram, og verða revsaðir.

4 Við^ eyðmýkt *og* HARRANS ótta *eru* ríkdómar, og heiður, og lív.

5 Tornir *og* snerrur *eru* í vegi hins rangvørga: hann, ið varðar sína sál, skal vera langt frá teimum.

6 Ven upp eitt barn í veginum, hann skuldi fara: og tá ið hann er gamalur, vil hann ikki víkja frá honum.

7 Hin ríki stjórnar yvir hinum fátæku, og lán*tak*arin *er* tænari hjá lán*veit*aranum.

8 Hann, ið sáar misgerð, skal heysta fáfongd: og stavurin av hansara firtni skal svitast.

9 Hann, ið hevur eitt stórtøkifult eyga, skal verða vælsignaður; tí hann gevur av sínum breyði til hin fátæka.

10 Kasta út spottaran, og klandur skal fara út; ja, stríð og lastan skulu halda uppat.

11 Hann, ið elskar hjarta-skírleika, *vegna* náðina av hansara varrum *skal* kongurin *vera* vinur hansara.

12 HARRANS eygu varðveita kunnleika, og hann kollvendir orðini hjá misbrótaranum.

13 Hin lati *maðurin* sigur, *Tað er* ein leyva uttanfyri, eg skal verða vigin í strætunum.

14 Munnurin á fremmandum kvinnum *er* ein djúp hola: hann, ið er stiknaður við av HARRANUM, skal falla harí.

15 Dárskapur *er* bundin í hjartað á einum barni; *men* rættleiðingar-stavurin skal reka hann langt frá honum.

16 Hann, ið kúgar hin fátæka, at økja *um ríkdómar* sínar, *og* hann, ið gevur til hin ríka, *skal* vissuliga *koma* til skort.

17 Boygg niður oyra títt, og hoyr orðini hjá teimum vísu, og set í verk títt hjarta at kunnleika mínum.

18 Tí at *tað er* eitt yndisligt ting, um tú haldi tey innan í tær; tey skulu hartil verða passaði í tínar varrar.

19 At títt álit má vera á HARRAN, havi eg gjørt kunnugt fyri tær henda dag, enntá fyri tær.

20 Havi ikki eg skrivað til tín frálík ting í ráðum og kunnleika,

21 At eg mátti fáa teg at kenna vissleikan hjá sannleikans orðum; at tú máttirt svara orðini av sannleika fyri teimum sum senda at tær?

22 Ræn ikki hin fátæka, av tí at hann *er* fátækur: eiheldur kúga hin nívda í portrinum:

23 Tí at HARRIN vil føra teirra søk, og herja sálina hjá teimum sum herjaðu teir.

24 Ger einkið vinalag við ein firtnan mann; og við einum ovursintum manni skalt tú ikki fara:

25 At ikki tú læri hans vegir, og fái eina snerru til tína sál.

26 Vert ikki tú *ēin* av teimum ið takast í hendur, *ella* av teimum ið eru veðhøld fyri skuldir.

27 Um tú einkið hevurt at rinda, hví skuldi hann tikið burt tína song undan tær?

28 Firra ikki hitt avgamla markaskjal, sum tínir fedrar hava sett.

29 Sært tú ein mann — ídnan í sínum gerningi? hann skal standa frammi fyri kongum; hann skal ikki standa frammi fyri meinigum *monnum*.

KAPITUL 23

TÁ ið tú siturt at eta við einum stjórnara, umhugsa dúgliga hvat *er* frammanfyri tær:

2 Og set ein knív til háls tín, um tú *veri* ein maður, givin til matarlyst.

3 Ver ikki trásamur um hansara krásir: tí at tær *eru* svikaligur matur.

4 Stríðst ikki *við* at verða ríkur: halt uppat frá egna vísdómi tínum.

5 Vilt tú seta tíni eygu uppá hatta sum er ikki? tí at *ríkdómar* vissuliga gera sær veingir; teir flúgva avstað sum ein ørn móti himni.

6 Et tú ikki breyðið hjá *honum sum hevur* eitt ónt eyga; eiheldur trái tú krásiligu matir hans:

7 Tí at eins og hann hugsar í hjarta sínum, soleiðis *er* hann: Et og drekk, sigur hann til tín; men hansara hjarta *er* ikki hjá tær.

8 Bitan, *sum* tú hevurt etið, skalt tú spýggja upp, og missa tíni søtu orð.

9 Tala ikki í oyruni á einum dára: tí at hann vil vanvirða vísdómin av tínum orðum.

10 Firra ikki hitt gamla markaskjal; og innfar ikki inn á akrar hinna faðirleysu:

11 Tí at endurloysari teirra *er* mektigur; hann skal føra teirra søk við teg.

12 Set í verk títt hjarta at leiðbeining, og tíni oyru til kunnskapar-orðini.

13 Afturhalt ikki rættleiðing frá barninum: tí *um* tú slært hann við stavinum, skal hann ikki doyggja.

14 Tú skalt slá hann við stavinum, og skalt bjarga hansara sál frá helviti.

15 Sonur mín, um títt hjarta veri *seg* víst, skal hjarta mítt fegnast, enntá mítt.

16 Ja, míni nýru skulu fegnast, tá ið tínar varrar tala rættar lutir.

17 Lat ikki títt hjarta øvunda syndarar: men *vert tú* í ótta HARRANS allan dagin langan.

18 Tí at vissuliga finst ein enda*lykt;* og tín eftirvæntan skal ikki verða skorin av.

19 Hoyr tú, sonur mín, og ver vísur, og vegleið títt hjarta í veginum.

20 Ver ikki millum vín-pimparar; millum teymaleysar átarar av kjøti:

21 Tí at drykkjumaðurin og átarin skulu koma til fátækradømis: og døsni skal klæða *ein mann* við spjørrum.

22 Lýð á faðir tín sum gat teg, og vanvirð ei tína móður tá ið hon er gomul.

23 Keyp sannleikan, og sel *hann* ikki; *eisini* vísdóm, og leiðbeining, og skil.

24 Faðir hins rættvísa skal stórliga fegnast: og hann, sum gat eitt víst *barn,* skal hava frøi um hann.

25 Tín faðir og tín móður skulu vera glað; og hon, sum teg føddi, skal fegnast.

26 Sonur mín, gev mær hjarta títt, og lat eygu tíni geva ans eftir vegum mínum.

27 Tí ein hora *er* ein djúp grøv; og ein fremmand kvinna *er* ein smøl hola.

28 Hon eisini liggur á lúri sum *eftir* eini brá, og økir um misbrótararnar millum manna.

29 Hvør hevur vei? hvør hevur sorg? hvør hevur trætnaðir? hvør hevur tvætlan? hvør hevur sár˘ uttan grund? hvør hevur reyðsemi av eygum?

30 Teir, sum dvølja leingi hjá víninum; teir, sum fara at søkja blandað vín.

31 Hygg ikki tú uppá vínið tá ið tað er reytt, tá ið tað gevur sín lit í steypinum, *tá ið* tað flytur seg á rættan *hátt*.

32 At endanum bítur tað sum ein høggormur, og stingur sum ein eiturormur.

33 Tíni eygu skulu eygleiða fremmandar kvinnur, og títt hjarta skal framsiga spilt ting.

34 Ja, tú skalt vera sum hann ið legst niður í miðjum havinum, ella sum hann ið liggur uppá toppinum av eini mastur.

35 Teir hava sligið meg, *skalt tú siga, og* eg varð ikki sjúkur; teir hava bart meg, *og* eg merkti *tað* ikki: nær skal eg vakna? Eg vil søkja tað enn eina ferð.

KAPITUL 24

VERT ikki tú øvundsjúkur inná óndar menn, eiheldur trái at vera við teimum.
2 Tí teirra hjarta studerar oyðing, og teirra varrar tala um ógerð.
3 Ígjøgnum vísdóm verður eitt hús bygt; og við^ skili verður tað grundfest:
4 Og við^ kunnleika skulu kømrini verða fylt við øllum dýrabærum og yndisligum ríkidømum.
5 Ein vísur maður *er* sterkur; ja, ein skilamaður økir um styrki.
6 Tí at við^ vísum ráði skalt tú føra kríggj títt: og í fjøldini av ráðgevum, *har er* tryggleiki.
7 Vísdómur *er* ov háur hjá einum dára: hann opnar ikki munn sín í portrinum.
8 Hann, sum upphugsar at gera ilt, skal verða kallaður ein skaðasamur persónur.
9 Dárskapar-hugsanin *er* synd: og spottarin *er* ein andstygd fyri monnum.
10 *Um* tú ørmaktist í mótburðar-deginum, *er* styrki tín lítil.
11 Um tú lati vera *við* at bjarga *teimum ið verða* drignir at deyða, og *teimum sum eru* um at verða vignir;
12 Um tú sigurt, Sí, vit vitstu tað ikki; umhugsar ikki hann, sum yvirvigar hjartað, *tað?* og hann, sum varðar tína sál, veit *ikki* hann *tað?* og skal *ikki* hann rinda til *hvørs* mans samsvarandi við verk^ hans?
13 Sonur mín, et tú hunang, av tí at *hann er* góður; og hunangskøkuna, *sum er* søt fyri smakki tínum:
14 Soleiðis *skal* vísdómsins kunnleiki *vera* at sál tíni: tá ið tú hevurt funnið *hann,* tá skal vera eitt endurgjald, og tín eftirvæntan skal ei verða skorin av.
15 Ligg ikki *á* lúri, O vondi *maður,* ímóti býli hins rættvísa; ræn ikki hvíldarstað hans:
16 Tí ein rættvísur *maður* fellur sjey ferðir, og rísur upp aftur: men teir vondu skulu falla í mein.
17 Fegnast ikki, tá ið tín fíggindi fellur; og lat ikki títt hjarta verða glatt, tá ið hann snávar:
18 At ikki HARRIN sjái *tað,* og tað mistokni honum, og hann vendi burt síni vreiði frá honum.
19 Ergra teg ikki orsakað av óndum *monnum,* eiheldur vert tú øvundsjúkur eftir teim vondu;
20 Tí at tað skal einkið endurgjald verða til hins ónda *mans;* kerti teirra vondu skal verða sløkt.
21 Sonur mín, óttast tú HARRAN og kongin: *og* fást ikki við teir sum eru givnir til broyting:
22 Tí at teirra skaðatilburður skal rísa brádliga; og hvør kennir oyðingina av teim báðum?
23 Hesi *ting* eisini *hoyra* til hinna vísu. *Tað er* ikki gott at hava meting av persónum í dómi.
24 Hann, ið sigur við hin vonda, Tú *ert* rættvísur; hann skal fólkið banna, tjóðum skal standast við hann:
25 Men til teirra, sum harta *hann,* skal vera fragd, og ein góð signing skal koma omanyvir teir.
26 *Hvør ēin maður* skal kyssa *hansara* varrar, sum gevur eitt rætt svar.
27 Fyrireika arbeið títt fyri uttan, og ger tað fittligt til tín sjálvs í akrinum; og síðan bygg títt hús.
28 Ver ikki eitt vitni ímóti tínum næsta uttan grund; og svík *ikki* við varrum tínum.
29 Sig ikki, Eg vil gera soleiðis við hann, eins og hann hevur gjørt við meg: eg vil rinda til mannin samsvarandi við verk hansara.
30 Eg fór framvið akrinum hjá tí lata; og framvið víngarðinum hjá manninum — tómur fyri skil;
31 Og sí, hann var allur vaksin yvir við tornum, *og* notur høvdu

dekkað ásjónina harà, og grótgarðurin harav var brotin niður.

32 Tá sá eg, *og* umhugsaði *tað* væl: eg hugdi uppá *tað, og* tók við leiðbeining.

33 *Enn* eitt sindur *av* svøvni, eitt sindur *av* durvi, eitt sindur *av* foldan av hondunum at sova:

34 So skal tín armóð koma *sum* ēin ið ferðast; og títt trot sum ein vígbúgvin maður.

KAPITUL 25

HESI *eru* eisini orðtøk hjá Sálomoni, sum menn Hēzē-kī´-āh kongs av Judah avritaðu.

2 *Tað er* dýrdin hjá Guði at loyna ein lut: men heiðurin hjá kongum *er* at grunda út eina søk.

3 Himinin til hædd, og jørðin til dýpd, og hjartað hjá kongum *er* órannsakiligt.

4 Tak burtur dreggið frá silvurinum, og koma skal fram eitt ker til edlaran.

5 Tak burtur hin vonda *frá* frammanfyri konginum, og hans hásæti skal vera grundfest í rættvísi.

6 Set ikki fram teg sjálvan í nærveru kongsins, og statt ikki í plássinum hjá miklum *monnum:*

7 Tí at betri *tað er,* at tað verði sagt við teg, Kom upp higar; enn at tú skuldirt verðið settur lægri í nærveru prinssins, hvønn tíni eygu hava sæð.

8 Far ikki fram skundisligani at trætast, at ikki *tú viti ei* hvat gerast eigur í endanum harà, tá ið tín næsti hevur gjørt teg til skammar.

9 Umrøð tína søk við næsta tín *sjálvan;* og avdúka ikki eitt loyndarmál fyri einum øðrum:

10 At ikki hann, sum hoyrir *tað,* geri teg til skammar, og títt ringa umdømi vendi ikki burt.

11 Eitt orð, hóskiliga talað, *er sum* súreplir av gulli í myndum av silvuri.

12 *Eins og* ein oyrnaringur av gulli, og eitt prýði av fínum gulli, *so er* ein vísur formanari yvir eitt lýðið oyra.

13 Eins og kuldin av kava í heystartíðini, *so er* eitt trúfast sendiboð fyri teimum ið senda hann: tí hann endurfrískar sálina hjá sínum meistarum.

14 Hvørið*so* breggjar sær sjálvum av eini falskari gávu, *er líka sum* skýggj˘ og vindur uttan regn.

15 Við˘ langari uppathalding verður ein prinsur yvirtalaður, og ein bleyt tunga brýtur beinið.

16 Hevurt tú funnið hunang? et so nógv sum er nóg mikið hjá tær, at ikki tú verði fyltur við tí, og spýggi tað.

17 Áftra tín fót frá húsi næsta tíns; at ikki hann verði móður av tær, og *so* hati teg.

18 Ein maður, sum ber falskan vitnisburð ímóti næsta sínum, *er* ein gassi, og eitt svørð, og ein hvøss ørv.

19 Álit á ein vantrúfastan mann í trongdartíð *er eins og* ein brotin tonn, og ein fótur úti úr liði.

20 *Eins og* hann, ið tekur burtur eitt klæði í køldum veðri, *og eins og* edikur uppá salpetur, soleiðis *er* hann sum syngur sangir fyri einum tungum hjarta.

21 Um tín fíggindi veri *seg* svangur, gev honum breyð at eta; og um hann veri *seg* tyrstur, gev honum vatn at drekka:

22 Tí at tú skalt hópa kol˘ av eldi uppá hans høvur, og HARRIN skal endurgjalda tær.

23 Norðanvindurin rekur burt regn: soleiðis *ger eisini* ein firtin ásjón eina bakbítandi tungu.

24 *Tað er* betri at búgva í horninum av húsatoppinum, enn við eini klandrandi kvinnu og í einum víðum húsi.

25 *Eins og* køld vøtn fyri eini tyrstari sál, soleiðis *eru* góð tíðindir frá einum fjarløgdum landi.

26 Ein rættvísur maður, fallandi niður frammi fyri tí vonda, *er eins og* ein órógvað kelda, og ein spilt lind.

27 *Tað er* ikki gott at eta nógvan hunang: soleiðis *hjá monnum* at søkja sína egnu dýrd *er ikki* dýrd.

28 Hann, sum onga stjórn *hevur* yvir egna anda sínum, *er eins og* ein staður *sum er* brotin niður, *og* uttan múrar.

KAPITUL 26

EINS og kavi á sumri, og eins og regn á heysti, soleiðis er heiður ikki sømiligur hjá einum dára.

2 Eins og fuglurin við reikan, eins og svalan við flúgving, soleiðis skal banningin grundleyst ikki koma.

3 Ein koyril til hestin, eitt boygsl til asnan, og ein stav til dárans bak.

4 Svara ikki einum dára samsvarandi við hansara dárskap, at ikki tú eisini verði líkur honum.

5 Svara einum dára samsvarandi við hansara dárskap, at ikki hann verði vísur í egna innbilni sínum.

6 Hann, sum sendir ein boðskap við hondini á einum dára, sker av føturnar, *og* drekkur skaða.

7 Leggir hins lamna eru ikki javnir: soleiðis *er* ein dømisøga í munninum á dárum.

8 Eins og hann, ið bindur ein stein í eina sleingju, soleiðis *er* hann, sum gevur heiður til ein dára.

9 *Eins og* ein tornur fer upp í hondina á einum drykkjumanni, soleiðis *er* ein dømisøga í munninum á dárum.

10 Hin mikli *Guð,* sum myndaði allar *lutir,* bæði endurrindar dáranum, og endurrindar misbrótarum.

11 Eins og ein hundur vendir aftur til spýggju sína, *soleiðis* ein dári vendir aftur til dárskap sín.

12 Sært tú ein mann — vísan í egna innbilni sínum? *tað er* meiri vón um ein dára enn um hann.

13 Tann lati *maðurin* sigur, *Tað er* ein leyva á veginum; ein leyva *er* á gøtunum.

14 *Eins og* hurðin vendir uppiá hongslum sínum, soleiðis *ger* hin lati uppiá song síni.

15 Tann lati fjalir sína hond í barmi *sínum;* tað harmar hann at føra hana aftur til munn sín.

16 Letivættið *er* vísari í sínum egna innbilni enn sjey menn, sum kunnu veita eina grundgeving.

17 Hann, sum fer framvið, *og* fæst við stríð, *sum hoyrir* ikki til hansara, *er eins og* ein, sum tekur ein hund eftir oyrunum.

18 Eins og ein ørur *maður,* sum kastar brennitrø, ørvar, og deyða,

19 Soleiðis *er* maðurin, *sum* svíkur sín næsta, og sigur, Eri ikki eg í stuttleika?

20 Har eingin viður er, *har* slóknar eldurin: soleiðis har, *ið* eingin søguberi *er,* heldur stríðið uppat.

21 *Eins og* kol *eru* fyri brennandi kolum, og viður fyri eldi; soleiðis *er* ein trætukærur maður til at kynda stríð.

22 Orðini hjá einum søgubera *eru* sum sárˇ, og tey fara niður í teir innastu partarnar av búkinum.

23 Brennandi varrar og eitt vont hjarta *eru eins og* eitt pottabrot, dekkað við silvur dreggi.

24 Hann, sum hatar, kávaletur við varrum sínum, og leggur niðurfyri svik innan í sær;

25 Tá ið hann talar fagurt, trúgv honum ikki: tí at *tað eru* sjey andstygdir í hansara hjarta.

26 *Hvørs* hatur, *ið* er dekkað við sviki, hansara vondska skal verða sýnd frammi fyri *allari* samkomuni.

27 Hvør*iðs*o grevur eina holu, skal falla harí: og hann, sum rullar ein stein, hann vil venda aftur omanyvir hann.

28 Ein lúgvandi tunga hatar *teir sum eru* nívdir av henni; og ein smikrandi munnur virkar oyðing.

KAPITUL 27

BREGGJA ikki tær sjálvum av í morgin; tí at tú veitst ikki hvat ein dagur kann bera fram.

2 Lat ein annan mann prísa tær, og ikki tín egna munn; ein fremmandan, og ei tínar egnu varrar.

3 Ein steinur *er* tungur, og sandurin vektigur; men vreiðin hjá dára *er* tyngri enn tey bæði.

4 Vreiði *er* grimm, og firtni *er* øgilig; men hvør *er* førur fyri at standa frammi fyri øvund?

5 Opinlýs hartan *er* betri enn loyniligur kærleiki.

6 Trúføst *eru* sárini av einum vini; men kossarnir av einum figgindа *eru* svikafullir.

7 Hin metta sálin vamlast við eina hunangskøku; men fyri hini svongu sál er hvør beiskur lutur søtur.

8 Sum ein fuglur sum reikar frá reiðri sínum, so *er* ein maður sum reikar frá plássi sínum.

9 Smyrsl og angilsi fegna hjartað: soleiðis *ger* søtsemin hjá vini mans við hjartaligum ráði.

10 Tín egna vin, og vin faðirs tíns, yvirgev ei; eiheldur far inn í hús bróður tíns á deginum av tínum skaðatilburði: *tí at* betri *er* ein næsti *sum er* nær, enn ein bróðir langt burturi.

11 Sonur mín, ver vísur, og ger hjarta mítt glatt, at eg má svara honum ið spottar meg.

12 Ein hyggin *maður* fyrisær hitt illa, *og* fjalir seg; *men* hinir einføldu fara áfram, *og* verða revsaðir.

13 Tak hansara klæði, sum er veðhald fyri ein fremmandan, og tak eitt pant av honum fyri eina fremmanda kvinnu.

14 Hann sum vælsignar sín vin við eini harðari rødd, rísandi árla um morgunin, tað skal verða roknað ein banning fyri honum.

15 Ein áframhaldandi drypping á einum sera regnsomum degi og ein trætukær kvinna eru álík.

16 Hvørsumhelst *ið* fjalir hana, fjalir vindin; og salvuna av síni høgru hond, *sum* avhylur *seg*.

17 Jarn hvessir jarn; soleiðis ein maður hvessir ásjónina hjá sínum vini.

18 Hvør*iðs*o varðar *um* fikutræið, skal eta tess frukt: soleiðis hann, sum vartar um meistara sín, skal verða ærdur.

19 Eins og í vatni, andlit *svarar* mót andliti; soleiðis hjartað hjá manni mót manni.

20 Helviti og oyðing eru aldri mett; soleiðis eyguni hjá manni eru aldri nøktað.

21 *Eins og* edlingargrýtan til silvur, og bræðsluovnurin til gull; soleiðis *er* ein maður fyri prísan síni.

22 Tó *at* tú skuldirt bukað ein dára í einum mortara millum hveiti við einum stoytara, *tó* vil ikki hansara dárskapur víkja frá honum.

23 Vert tú íðin at kenna støðu smáfæafylgja tína, *og* hygg væl til stórfæafylgja tína.

24 Tí at ríkidømir *eru* ikki um ævir: og *varir* krúnan til hvørja ætt?

25 Hoyggið birtist, og tað mjúka grasið sýnir seg, og urtir úr fjøllunum verða savnaðar.

26 Lombini *eru* til klædnað tín, og geitirnar *eru* prísur akursins.

27 Og *tú skalt hava* geitamjólk nokk til mat tín, til matin hjá húsfólki tínum, og *til* uppihald moyggja tína.

KAPITUL 28

HINIR vondu flýggja, tá ið eingin maður eltir: men hinir rættvísu eru djarvir sum ein leyva.

2 Fyri misbrotið hjá einum landi, mangir *eru* prinsarnir hjá tí: men við^ einum manni av skili *og* kunnleika skal støðan *harhjá* verða framlongd.

3 Ein fátækur maður, sum kúgar teir fátæku, *er eins og* eitt strúkandi regn, sum ongan mat eftirletur.

4 Teir, sum yvirgeva lógina, prísa tí vonda: men slíkir, sum halda lógina, stríðast við teir.

5 Óndir menn skilja ikki dóm: men teir, sum søkja HARRAN, skilja øll *ting*.

6 Betri *er* hin fátæki sum gongur í reiðiligleika sínum, enn *hann sum er* spiltur *í* vegum *sínum,* tó *at* hann *veri seg* ríkur.

7 Hvøriðso heldur lógina, *er* ein vísur sonur: men hann, sum er lagsbróðir hjá teymaleysum *monnum, ger* faðir sínum skomm.

8 Hann, sum við fæleigu og órættlátum vinningi økir um *figgjar*evni sítt, hann skal savna tað til hansara sum vil várkunna hinum fátæku.

9 Hann, ið vendir burtur sítt oyra frá at hoyra lógina, sjálvt hansara bøn *skal vera* andstygd.

10 Hvøriðso veldur tí rættvísa at fara til stroks í einum óndum vegi, hann skal falla sjálvur inn í sína egnu holu: men hinir reiðiligu skulu hava góðar *lutir* í ogn.

11 Tann ríki maðurin *er* vísur í sínum egna innbilni; men hin fátæki, sum hevur skil, grundar hann út.

12 Tá ið rættvísir *menn* fegnast, *er* mikil dýrd: men tá ið teir vondu rísa, verður maður fjaldur.

13 Hann, ið hylur syndir sínar, skal ikki framganga: men hvøriðso játtar og yvirgevur *tær,* skal hava miskunn.

14 Sælur *er* tann maður sum óttast allan veg: men hann, sum herðir sítt hjarta, skal falla inn í mein.

15 *Eins og* ein ýlandi leyva, og ein flakkandi bjørn; *soleiðis er* ein vondur stjórnari yvir tí fátæka fólkinum.

16 Prinsurin, hvørjum trýtur skil, *er* eisini ein mikil kúgari: *men* hann, sum hatar havisjúku, skal framleingja *sínar* dagar.

17 Ein maður, sum innir harðskap móti blóðinum hjá *nøkrum* persóni, skal flýggja til holuna; lat ongan mann stuðla honum.

18 Hvøriðso gongur reiðiliga, skal verða bjargaður: men *hann, sum er* spiltur *í* vegum *sínum,* skal falla alt fyri eitt.

19 Hann, sum veltir land sítt, skal hava ríkiligt av breyði: men hann, sum fylgir eftir fáfongdum *persónum,* skal hava fátækdóm nokk.

20 Ein trúfastur maður skal floyma yvir við signingum: men hann, sum skundar *sær* at verða ríkur, skal ei vera sakleysur.

21 At hava metan av persónum *er* ikki gott: tí at fyri eitt stykki av breyði vil *tann* maður misbróta.

22 Hann, sum skundar *sær* at verða ríkur, *hevur* eitt ónt eyga; og umhugsar ikki, at fátækradømi skal koma uppá hann.

23 Hann, ið hartar ein mann, skal aftaná finna meiri tokka enn hann, sum smikrar við tunguni.

24 Hvøriðso rænir faðir sín, ella móður sína, og sigur, *Tað er* einkið misbrot; hin sami *er* lagsbróðirin hjá einum oyðara.

25 Hann, ið er av einum stoltum hjarta, øsir upp stríð: men hann, sum setur sítt álit á HARRAN, skal verða gjørdur feitur.

26 Hann, ið lítur á sítt egna hjarta, er ein dári: men hvøriðso

gongur vísliga, hann skal verða bjargaður.

27 Honum, ið gevur tí fátæka, skal ikki tróta: men hann, sum fjalir síni eygu, skal hava manga banningina.

28 Tá ið hinir vondu rísa, fjala menn seg: men tá ið teir farast, taka hinir rættvísu til.

KAPITUL 29

HANN, sum verandi ofta hartaður, herðir *sín* svíra, skal brádliga verða oyddur, og tað uttan hjálparmiddul.

2 Tá ið teir rættvísu sita í harradømi, fegnast fólkið: men tá ið tann vondi ber stjórn, harmast fólkið.

3 Hvør*ið*enn elskar vísdóm, *ger* fegnan sín faðir: men hann, sum heldur samlag við skøkjur, brúkar *sítt figgjar*evni.

4 Við^ dómi grundfestir kongurin landið: men hann, sum tekur við gávum, kollvendir tí.

5 Ein maður, sum smikrar sín næsta, breiðir eitt garn til føtur sínar.

6 Í misbrotinum hjá einum óndum manni, *har er* ein snerra: men hin rættvísi syngur og fegnast.

7 Hin rættvísi umhugsar søk hinna fátøku: *men* hin vondi gáar ikki *um* at vita *tað*.

8 Spotskir menn føra ein stað inn í eina snerru: men vísir *menn* venda burtur vreiði.

9 *Um* ein vísur maður stríðist við ein fávitskutan mann, hvørt hann leiki í ella læi, *er* eingin hvíld.

10 Hinir blóðtyrstu hata hin reiðiliga: men hinir rættlátu søkja hansara sál.

11 Ein dári mælir allan sín hug: men ein vísur *maður* heldur tí inni til aftaná.

12 Um ein stjórnari gevi gætur eftir lygnum, *eru* allir hansara tænarar vondir.

13 Hin fátæki og hin svikfulli maðurin hittast tilsaman: HARRIN lýsnar eyguni á teim báðum.

14 Tann kongur, sum trúliga dømir hinar ørmu, hans hásæti skal vera grundfest um ævir.

15 Stavurin og formaning geva vísdóm: men eitt barn, eftirlatið *til sín sjálvs,* ger hansara móður til skammar.

16 Tá ið hinir vondu verða margfaldaðir, tekur misbrot til: men hinir rættvísu skulu síggja teirra fall.

17 Rættleið tín son, og hann skal geva tær hvíld; ja, hann skal geva sál tíni fragd.

18 Har eingin sjón *er,* ferst fólkið: men hann, ið heldur lógina, fegin *er* hann.

19 Ein tænari vil ei verða rættleiddur við^ orðum: tí hóast hann skilji, vil hann ikki svara.

20 Sært tú ein mann, *sum er* skundigur í orðum sínum? *tað er* meiri vón um ein dára enn um hann.

21 Hann, sum eymligani elur upp tænara sín frá barni av, skal í longdini fáa hann *at* gerast *sín* sonur.

22 Ein firtin maður øsir upp stríð, og ein ovursintur maður fløðir yvir í misbroti.

23 Hugmóðin hjá einum manni skal føra hann lágt: men heiður skal halda uppi hinum eyðmjúka í anda.

24 Hvør*ið*so er lagsmaður við ein tjóv, hatar sína egnu sál: hann hoyrir banning, og avdúkar *tað* ikki.

25 Óttin fyri manni ber eina snerru: men hvør*ið*so setur sítt álit á HARRAN, skal vera tryggur.

26 Mangir søkja stjórnarans góðtokka; men *hvørs* mans dómur *kemur* frá HARRANUM.

27 Ein órættlátur maður *er* ein andstygd fyri hinum rættlátu: og *hann, sum er* reiðiligur í veginum, *er* andstygd fyri hinum vonda.

KAPITUL 30

ORÐINI av Á´-gûr Já´-kēh syni, *enntá* prophetīið: maðurin talaði við Ī´-thī-ēl, enntá við Ī´-thī-ēl og Ū´-cāl,

2 Vissuliga, eg *eri* meiri óskynskur enn *nakar* maður, og havi ikki skilið hjá einum manni.

3 Eg eiheldur lærdi vísdóm, ella havi kunnleika teirra heilagu.

4 Hvør hevur stigið upp inn í himin, ella stigið niður? hvør hevur savnað vindin í nevar sínar? hvør hevur bundið vøtnini í eitt klæði? hvør hevur grundfest allar endar jarðarinnar? hvat *er* navn hans, og hvat *er* navnið hjá syni hans, um tú dugirt siga?

5 Hvørt orð hjá Guði *er* skírt: hann *er* ein skjøldur hjá teimum sum seta sítt álit á hann.

6 Legg ikki tú afturat orðum hansara, at ikki hann írættaseti teg, og tú verði funnin ein lygnari.

7 Tvinni *ting* havi eg umbiðið av tær; sýt mær *tey* ikki, áðrenn eg doyggi:

8 Firra fjart frá mær fáfongd og lygnir: gev mær hvørki fátækradømi ella ríkidømir; føð meg við mati — hóskiligur til mín:

9 At ikki eg verði mettur, og avnokti *teg,* og sigi, Hvør *er* HARRIN? ella at ikki eg verði fátækur, og stjali, og taki navn Guðs míns *í fáfongd.*

10 Ákær ikki ein tænara at hansara meistara, at ikki hann banni teg, og tú verði funnin sekur.

11 *Til er* ein ætt, *sum* bannar sín faðir, og vælsignar ei sína móður.

12 *Til er* ein ætt, *sum eru* skír í sínum egnu eygum, og *tó* er ikki tvigin frá síni skitni.

13 *Til er* ein ætt, O hvør hástór teirra eygu eru! og teirra eygnalokur eru hevjaðar upp.

14 *Til er* ein ætt, hvørs tenn *eru sum* svørð, og teirra jaksla tenn *sum* knívar, at gloypa hinar ørmu omanav jørðini, og hinar tørvandi frá *millum* manna.

15 Hestaigulin hevur tvær døtur, *rópandi,* Gev, gev. Til eru trý *ting, sum* aldri verða mettað, *ja,* fýra *ting* siga ikki, *Tað er* nóg mikið:

16 Grøvin; og tað óburna móðurlívið; jørðin, *sum* ikki verður fylt við vatni; og eldurin, *sum* ei sigur, *Tað er* nóg mikið.

17 Tað eyga, *sum* spottar eftir faðir *sínum,* og vanvirðir at lýða *sína* móður, ravnar dalsins skulu pikka tað út, og hinar ungu ørnir skulu eta tað.

18 Tað veri *seg* trý *ting, sum* eru ov undurfull fyri meg; ja, fýra, sum eg skyni ikki:

19 Vegurin hjá eini ørn í luftini; vegurin hjá einum høggormi uppiá einum kletti; vegurin hjá einum skipi í miðju havsins; og vegurin hjá einum manni við eini moyggj.

20 Slíkur *er* vegurin hjá eini horfiknari kvinnu; hon etur, og turkar sín munn, og sigur, Eg havi onga vondsku gjørt.

21 Fyri trý *ting* verður jørðin vankyrrað, og fyri fýra *sum* hon ei kann bera:

22 Fyri ein tænara, tá ið hann ríkir; og ein dára, tá ið hann verður mettaður við mati;

23 Fyri eina ótespiliga *kvinnu,* tá ið hon verður gift; og eina tænastumoyggj, sum er arvingi til sína matmóður.

24 Tað veri *seg* fýra *ting, sum eru* lítil uppiá jørðini, men tey *eru* ovurhonds vís:

25 Meyrurnar *eru* eitt fólk — ei sterkt, tó tilreiða tær mat sín um summarið;

26 Kaninirnar *eru bert* ússaligt fólk, tó gera tær síni hús í klettunum;

27 Grashoppurnar hava ongan kong, tó fara tær út, allar av teimum, eftir flokkum;

28 Eiturkoppurin tekur fatur *í* við hondum sínum, og er í konga slottum.
29 Tað veri *seg* trý *ting,* sum ganga væl, ja, fýra eru tekkilig í gongu:
30 Ein leyva, *sum er* sterkast millum djóra, og ei vendir burt fyri nøkrum;
31 Ein mjóhundur; ein havur eisini; og ein kongur, ímóti hvørjum eingin upprísing *finst*.
32 Um tú hevurt gjørt fávitskuliga í at lyfta upp teg sjálvan, ella um tú hevurt hugsað ilt, *legg* tína hond uppá tín munn.
33 Vissuliga, kirningin av mjólk ber fram smør, og vindingin av nøsini ber fram blóð: soleiðis noyðingin av vreiði ber fram stríð.

KAPITUL 31

ORÐINI av Lemuel kongi, prophetīið sum móðir hansara lærdi hann.
2 Hvat, sonur mín? og hvat, sonur móðurlívs míns? og hvat, sonur heitstreingja mína?
3 Gev ei tína styrki at kvinnum, ella tínar vegir til hatta sum oyðileggur kongar.
4 *Tað er* ikki fyri kongar, O Lemuel, *tað er* ikki fyri kongar at drekka vín; ella fyri prinsar sterkan drykk:
5 At ikki teir drekki, og gloymi lógina, og spilli dómin hjá nøkrum av teimum nívdu.
6 Gev sterkan drykk at honum, sum er um at týnast; og vín innat teimum, ið veri av tungum hjørtum.
7 Lat hann drekka, og gloyma sín fátækdóm, og minnast sín vesældóm ei meira.
8 Opna tín munn fyri hin málleysa í søkini hjá øllum slíkum ið eru útnevndir til oyðingar.
9 Opna tín munn, døm rættvísliga, og før søk hins fátæka og tørvandi.
10 ¶ Hvør kann finna eina dygdsama kvinnu? tí hennara virði *er* langt omanfyri rubīnar.
11 Hjarta ektamans hennara tryggliga lítur á hana, so at hann ongan tørv skal hava á fongi.
12 Hon vil gera honum gott og ikki ilt allar dagarnar av lívi sínum.
13 Hon søkir ull, og línurt, og virkar viljugani við sínum hondum.
14 Hon er líkasum skipini hjá handilsmonnunum; hon kemur við sínum mati fjarvegis frá.
15 Hon rísur eisini meðan tað er enn nátt, og gevur mat til húsfólk sítt, og ein skamt til moyggja sína.
16 Hon umhugsar ein akur, og keypir hann: við ávøkstinum av sínum hondum hon plantar ein víngarð.
17 Hon gyrðir sínar lendar við styrki, og styrkir sínar armar.
18 Hon varnast, at hennara handilsvøra *er* góð: hennara kertaljós slóknar ikki um nátt*ina*.
19 Hon leggur sínar hendur til rokkin, og hennara hendur halda *á* snælduni.
20 Hon strekkir út sínar hendur til hin fátæka; ja, hon rættir fram sínar hendur til hin tørvandi.
21 Hon er ikki rædd fyri kavanum fyri húshaldi sínum: tí at alt hennara húshald *eru* klædd við skarlak.
22 Hon ger sær dekkingar av áklæði; hennara klædnaður *er* silki og purpur.
23 Hennar ektamaður er kendur í portrunum, tá ið hann situr millum hinna elstu landsins.
24 Hon ger fint lín, og selur *tað;* og avhendir keypmanninum gyrðlar.
25 Styrki og heiður *eru* klædnaður hennara; og hon skal fegnast í komandi tíð.

26 Hon opnar sín munn við vísdómi; og í hennara tungu *er* blíðseminnar lóg.
27 Hon hyggur væl til vegir húsfólks síns, og etur ikki yrkisloysisins breyð.
28 Hennara børn reisa *seg* upp, og kalla hana vælsignaða; hennara ektamaður *eisini,* og hann prísar henni.
29 Mangar døtur hava gjørt dygdsamliga, men tú bert av teim øllum.
30 Yndi *er* svikafult, og vakurleiki fáfongdur: *men* ein kvinna, *sum* óttast HARRAN, hon skal verða prísað.
31 Gevið henni av ávøksti handa hennara; og latið hennara egnu verk prísa henni í portrunum.

PRÆDIKARIN;
ELLA, ECCLESIASTES.

KAPITUL 1

ORÐINI av Prædikaranum, syni Dávids, kongi í Jerusalem.
2 Fáfongda*nna* fáfongd, sigur Prædikarin, fáfongda*nna* fáfongd; alt *er* fáfongd.
3 Hvat gagn hevur ein maður av øllum sínum strevi sum hann tekur undir sólini?
4 *Ein* ætt fer burtur, og *ein onnur* ætt kemur: men jørðin verður um ævir.
5 Sólin eisini reisist, og sólin fer niður, og skundar til plass sítt, har hon reistist.
6 Vindurin fer ímóti suðuri, og vendir íkring at norðuri; hann hvirlar íkring áframhaldandi, og vindurin vendir tilbakar aftur samsvarandi við hansara ringrásir.
7 Allar áirnar renna inn í sjógvin; sjógvurin tó *verður* ikki fullur; at tí plássi, hvaðani frá áirnar koma, hagar venda tær aftur aftur.
8 Øll ting *eru* full av strevi; maður kann ikki mæla *tað:* eygað verður ikki nøktað við sígging, ella oyrað mettað við hoyring.
9 Tað ting sum hevur verið, tað *er tað* sum verða skal; og tað sum er gjørt, *er* tað sum skal verða gjørt: og *tað er* einkið nýtt *ting* undir sólini.
10 Er *nakað* ting, hvarum tað kann verða sagt, Sí, hetta *er* nýtt? tað hevur verið longu úr gamlari tíð, sum var undan okkum.
11 *Tað er* eingin endurminning um fyrri *ting;* eiheldur skal tað vera *nøkur* endurminning um *ting* sum koma skulu hjá *teimum* sum skulu koma aftaná.
12 ¶ Eg, Prædikarin, var kongur yvir Ísrael í Jerusalem.
13 Og eg gav mítt hjarta til at søkja og grunda út viðˆ vísdómi viðvíkjandi øllum *tingum* sum verða gjørd undir himni: hetta svára sleipið hevur Guð givið til mannasynirnar at verða íðkaðar harvið.
14 Eg havi sæð øll verkini sum verða gjørd undir sólini; og sí, alt *er* fáfongd og ergran av anda.
15 *Tað, sum er* krókut, kann ei verða gjørt beint: og tað, sum er vantandi, kann ei verða upptalt.
16 Eg samtalaði við mítt egna hjarta, sigandi, Sí, eg eri komin til mikla støðu, og havi vunnið meiri vísdóm enn allir *teir* sum hava verið undan mær í Jerusalem: ja, mítt hjarta hevði mikla roynslu av vísdómi og kunnleika.
17 Og eg gav mítt hjarta til at skyna vísdóm, og til at skyna ørskap og dárskap: eg varnaðist, at hetta eisini er ergran av anda.

18 Tí at í miklum vísdómi *er* mikil harmur: og hann, sum økir um kunnleika, økir um sorg.

KAPITUL 2

EG segði í hjarta mínum, Lat fara nú, eg vil royna teg við kæti, tessvegna njót njóting: og sí, hetta eisini *er* fáfongd.

2 Eg segði um látur, *Hann er* óður: og um kæti, Hvat ger tað?

3 Eg søkti í mínum hjarta at geva meg sjálvan at víni, tó gerandi kunnugt mítt hjarta við vísdóm; og at leggja hald á dárskap, til eg mátti sjá hvat *var* hatta góða fyri mannasynirnar, sum teir skuldu gera undir himninum allar dagarnar av sínum lívi.

4 Eg gjørdi mær mikil verk; eg bygdi mær hús; eg plantaði mær víngarðar:

5 Eg gjørdi mær urtagarðar og aldingarðar, og eg plantaði trø í teimum av alskyns fruktum:

6 Eg gjørdi mær hyljar av vatni, til at vatna við teimum viðin sum ber fram trø:

7 Eg fekk *mær* tænarar og moyggjar, og hevði tænarar føddar í húsi mínum; eg eisini hevði miklar ognir av stórum og lítlum fenaði uppum allar sum vóru í Jerusalem undan mær:

8 Eg savnaði mær eisini silvur og gull, og serstaka dýrgripin hjá kongum og úr fylkjunum: eg fekk mær mannsangarar og kvennsangarar, og fragdirnar hjá mannasonunum, *eins og* tónleikslig ljóðførir, og tað av øllum sløgum.

9 So eg var mikil, og øktist meir enn allir sum vóru undan mær í Jerusalem: eisini mín vísdómur varð verandi hjá mær.

10 Og hvatsumhelst *ið* míni eygu tráaðu, helt eg ikki frá teimum, eg afturhelt ikki mítt hjarta frá nakrari frøi; tí mítt hjarta fegnaðist í øllum strevi mínum: og hetta var mín skamtur av øllum strevi mínum.

11 Tá hugdi eg á øll verkini sum mínar hendur høvdu virkað, og á strevið sum eg hevði strevast at gera: og sí, alt *var* fáfongd og ergran av anda, og *har var* einkið gagn undir sólini.

12 ¶ Og eg vendi mær at eygleiða vísdóm, og ørskap, og dárskap: tí hvat *kann* tann maðurin *gera* sum kemur aftaná kongin? *enntá* tað sum longu er vorðið gjørt.

13 Tá sá eg, at vísdómur ber av dárskapi, so langt sum ljós ber av myrkri.

14 Eygu vísa mansins *eru* í høvdi hans; men dárin gongur í myrkri: og eg sjálvur varnaðist eisini, at ēin hending hendir fyri teir allar.

15 Tá segði eg í hjarta mínum, Eins og tað hendir fyri dáran, soleiðis hendir tað enntá fyri meg; og hví var eg tá meiri vísur? Tá segði eg í hjarta mínum, at hetta eisini *er* fáfongd.

16 Tí at *tað er* eingin endurminning um hin vísa meir enn um dáran um ævir; við tað at tað, sum nú *er* í døgunum sum koma skulu, skal alt verða gloymt. Og hvussu doyr hin vísi *maðurin?* eins og dárin.

17 Tí hataði eg lív; av tí at tað verk, sum verður virkað undir sólini, *er* svárligt at mær: tí at alt *er* fáfongd og ergran av anda.

18 ¶ Ja, eg hataði alt mítt strev sum eg hevði tikið undir sólini: av tí at eg skuldi eftirlata tí manninum tað sum skuldi vera aftaná meg.

19 Og hvør veit hvørt hann skal vera ein vísur *maður,* ella ein dári? tó skal hann hava stjórn yvir øllum mínum strevi, í hvørjum eg havi strevast, og hvarí eg havi sýnt meg sjálvan vísan undir sólini. Hetta *er* eisini fáfongd.

20 Tí fór eg umkring til at elva
mínum hjarta at vera fyri ongum
um alt tað strev sum eg tók undir
sólini.
21 Tí at til er ein maður, hvørs
strev *er* í vísdómi, og í kunnleika,
og í rættferð; tó til ein mann, sum
hevur ikki strevast harí, skal hann
eftirlata tað *til* skamt hans. Hetta
eisini *er* fáfongd og ein mikil ilska.
22 Tí at hvat hevur maður av
øllum sínum strevi, og av ergran-
ini av sínum hjarta, hvarí hann
hevur strevast undir sólini?
23 Tí at allir hansara dagar *eru*
sorgir, og hansara sleip harmur;
ja, hansara hjarta tekur ikki hvíld
um náttina. Hetta er eisini fá-
fongd.
24 ¶ *Tað er* einkið betri hjá
einum manni, *enn* at hann skuldi
eta og drekka, og *at* hann skuldi
fáa sína sál *at* njóta gott í strevi
sínum. Hetta eisini sá eg, at tað
var frá Guðs hond.
25 Tí at hvør kann eta, ella
hvør annars kann skunda *herat,*
meiri enn eg?
26 Tí at *Guð* gevur til ein mann,
sum *er* góður í síni eygsjón, vís-
dóm, og kunnleika, og gleði: men
til syndaran gevur hann sleip,
at savna og rúgva upp, at hann
má geva til *hansara sum er* góður
frammi fyri Guði. Hetta eisini *er*
fáfongd og ergran av anda.

KAPITUL 3

TIL hvørt *ting er* eitt skeið,
og ein tíð til hvørja ætlan
undir himninum:
2 Ein tíð til at verða føddur, og
ein tíð til at doyggja; ein tíð til at
planta, og ein tíð til at rykkja upp
tað sum er plantað;
3 Ein tíð til at drepa, og ein tíð
til at grøða; ein tíð til at bróta
niður, og ein tíð til at byggja upp;
4 Ein tíð til at gráta, og ein tíð
til at flenna; ein tíð til at harma,
og ein tíð til at dansa;
5 Ein tíð til at kasta burtur
steinar, og ein tíð til at savna
steinar saman; ein tíð til at um-
fevna, og ein tíð til at halda *sær*
frá umfevning;
6 Ein tíð til at fáa, og ein tíð til
at missa; ein tíð til at varðveita,
og ein tíð til at kasta burtur;
7 Ein tíð til at skræða, og ein
tíð til at seyma; ein tíð til at halda
tøgn, og ein tíð til at tala;
8 Ein tíð til at elska, og ein tíð
til at hata; ein tíð av kríggi, og ein
tíð av friði.
9 Hvat gagn hevur hann, sum
arbeiðir í tí, hvarí hann strevast?
10 Eg havi sæð tað sleip, sum
Guð hevur givið til mannasynir-
nar at verða íðkaðar í tí.
11 Hann hevur gjørt hvønn
lut vakran í tíð hansara: hann
eisini hevur sett verøldina í teirra
hjarta, so at eingin maður kann
finna útav verkinum, sum Guð
ger, frá byrjanini til endan.
12 Eg veit, at *tað er* einkið gott
í teimum, uttan hjá *einum manni*
at fegnast, og at gera gott í lívi
sínum.
13 Og eisini, at hvør maður
skuldi eta og drekka, og njóta tað
góða av øllum strevi sínum, tað *er*
gáva Guðs.
14 Eg veit, at hvatsumhelst *ið*
Guð ger, tað skal vera um ævir:
einkið kann verða lagt til tess, ella
nakað ting tikið frá tí: og Guð
ger *tað,* at *menn* skuldu óttast
frammi fyri honum.
15 Tað, sum hevur verið, er
nú; og tað, sum verða skal, hevur
longu verið; og Guð krevur tað
sum er umliðið.
16 ¶ Og harafturat sá eg und-
ir sólini dóms-plássið, *at* vondska
var har; og rættvísis-plássið, *at*
misgerð *var* har.
17 Eg segði í hjarta mínum,
Guð skal døma hin rættvísa og
hin vonda: tí at *tað er* ein tíð har
til hvørja ætlan og til hvørt verk.

18 Eg segði í hjarta mínum viðvíkjandi støðuni hjá mannasonunum, at Guð mátti tilkennargivið teir, og at teir máttu sæð, at teir sjálvir eru djór.
19 Tí at tað, sum viðurfer mannasonunum, viðurfer djórum; enntá ēitt ting viðurfer teimum: eins og ēitt doyr, soleiðis doyr hītt; ja, tey hava øll ēin andadrátt; so at ein maður hevur onga frammistøðu framum eitt djór: tí at alt *er* fáfongd.
20 Øll fara at ēinum plássi; øll eru av støvinum, og øll venda aftur til støv aftur.
21 Hvør kennir anda mans, sum fer uppeftir, og anda djórsins, sum fer niðureftir til jarðarinnar?
22 Hvørsvegna eg varnist, at *tað er* einkið betri, enn at ein maður skuldi fegnast í egnu verkum sínum; tí at tað *er* skamtur hans: tí at hvør skal føra hann til at síggja hvat skal verða eftir hann?

KAPITUL 4

SO eg vendi aftur, og umhugsaði allar tær kúganir sum verða gjørdar undir sólini: og sí tárini hjá *slíkum sum vórðu* kúgaðir, og teir høvdu ongan uggara; og á síðuni hjá teirra kúgarum, *har var* máttur; men teir høvdu ongan uggara.
2 Hvørsvegna eg prísaði teimum deyðu sum longu eru deyðir, meir enn teimum livandi sum eru enn á lívi.
3 Ja, betri *er hann* enn báðir teir sum ikki enn hevur verið, sum ikki hevur sæð hitt illa verk sum verður gjørt undir sólini.
4 ¶ *Upp*aftur umhugsaði eg alt sleip, og hvørt rætt verk, at fyri hetta verður ein maður øvundaður av sínum næsta. Hetta *er* eisini fáfongd og ergran av anda.
5 Dárin foldar sínar hendur saman, og etur sítt egna hold.
6 Betri *er* ein krumma *við* kvirri, enn báðar hendurnar fullar *við* sleipi og ergran av anda.
7 ¶ Tá vendi eg aftur, og eg sá fáfongd undir sólini.
8 Til er ēin *einsamallur,* og *til er* ikki ein *hin* annar; ja, hann hevur hvørki barn ella bróðir: tó *er* eingin endi á øllum strevi hansara; eiheldur verður eyga hansara mettað við ríkdómum; eiheldur *sigur hann,* Fyri hvønn strevist eg, og ræni mína sál fyri gott? Hetta *er* eisini fáfongd, ja, tað *er* eitt svárt sleip.
9 ¶ Tveir *eru* betri enn ēin; av tí at teir hava eitt gott endurgjald fyri strev sítt.
10 Tí at um teir falli, vil hin ēini lyfta upp felaga sín: men vei til hansara, *sum er* einsamallur, tá ið hann fellur; tí at *hann hevur* ikki ein annan at hjálpa sær upp.
11 *Upp*aftur, um tveir liggi saman, tá hava teir hita: men hvussu kann ēin vera heitur *aleinaur?*
12 Og um ēin havi yvirvág ímóti honum, skulu tveir standast ímóti honum; og ein trý-táttaður tráður verður ikki snarliga slitin.
13 ¶ Betri *er* eitt fátækt og eitt víst barn, enn ein gamal og dársamur kongur, sum ikki meira vil verða ámintur.
14 Tí út úr fongsli hann kemur at ríkja; hvarafturímóti eisini *hann, sum verður* føddur í kongadømi hansara, gerst fátækur.
15 Eg umhugsaði allar hinar livandi sum ganga undir sólini, við hinum næsta barni sum skal standa upp í hansara stað.
16 *Tað er* eingin endi á øllum fólkunum, *enntá* á øllum sum hava verið undan teimum: teir eisini, sum koma aftaná, skulu ikki fegnast í honum. Vissuliga, hetta *er* eisini fáfongd og ergran av anda.

KAPITUL 5

VARÐA tín fót, tá ið tú fert til húss Guðs, og ver meiri tilreiðar at hoyra, enn at geva sláturoffur dára˘: tí at teir umhugsa ikki, at teir gera ilt.

2 Ver ikki bráður við munni tínum, og lat ikki títt hjarta vera skundið at mæla *nakað* ting frammi fyri Guði: tí at Guð *er* í himni, og tú uppiá jørð: tessvegna lat orð tíni vera fá.

3 Tí at ein dreymur kemur gjøgnum fjøldina av gerningi; og røddin á einum dára *verður kend* við fjøldini av orðum.

4 Tá ið tú streingirt eitt heiti at Guði, útset ikki at rinda tað; tí at *hann hevur* onga fragd í dárum: rinda tað sum tú hevurt strongt.

5 Betri *tað er,* at tú ei skuldirt streingja, enn at tú skuldirt streingja og ikki rinda.

6 Loyv ikki tínum munni at volda holdi tínum at synda; eiheldur sigi tú frammi fyri einglinum, at tað *var* ein villfaring: hví skuldi Guð verðið firtin at rødd tíni, og oytt verkini av tínum hondum?

7 Tí at í fjøldini av dreymum og mongum orðum *eru* eisini *ymsar* fáfongdir: men óttast tú Guð.

8 ¶ Um tú sært kúgingina av tí fátæka, og harðliga spilling av dómi og rættlæti í einum fylki, undrast ikki um málið: tí at *hann, sum er* hægri enn hin hægsti, gevur gætur; og *til veri* hægri enn teir.

9 ¶ Harafturat, vinningur jarðarinnar er til alra: kongurin *sjálvur* verður tæntur av akrinum.

10 Hann, ið elskar silvur, skal ikki verða mettaður við silvuri; ella hann, sum elskar ríkiligleika við øking: hetta *er* eisini fáfongd.

11 Tá ið góðs økjast, verða teir øktir sum eta tey: og hvat gott *er tað* fyri eigarunum av teimum, uttan skoðingin *av teimum* við teirra eygum?

12 Svøvnurin hjá einum strevandi manni *er* søtur, hvørt hann eti lítið ella mikið: men ríkiligleikin hjá tí ríka vil ikki loyva honum at sova.

13 Tað er ein svár ilska *sum* eg havi sæð undir sólini, *nevniliga,* ríkdómar goymdir til eigararnar av teimum til teirra mein.

14 Men teir ríkdómarnir farast við illum sleipi: og hann gitur ein son, og einkið *er* í hond hansara.

15 Eins og hann kom fram út úr móðurlívi móður sínar, nakin skal hann venda aftur til at fara eins og hann kom, og skal einkið taka av strevi sínum, sum hann kann bera burtur í hond síni.

16 Og hetta eisini *er* ein svár ilska, *at* í øllum punktum eins og hann kom, soleiðis skal hann fara: og hvat gagn hevur hann sum hevur strevast fyri vindin?

17 Allar sínar dagar eisini etur hann í myrkri, og *hann hevur* mikla sorg og vreiði við sjúku síni.

18 ¶ Síggj *tað,* sum eg havi sæð: *tað er* gott og sámiligt *hjá ēinum* at eta og at drekka, og at njóta tað góða av øllum sínum strevi, sum hann tekur undir sólini allar dagarnar av sínum lívi, sum Guð gevur honum: tí at tað *er* skamtur hansara.

19 Hvør maður eisini, til hvørs Guð hevur givið ríkdómar og eyð, og hevur givið honum mátt til at eta harav, og at taka skamt sín, og at fegnast í strevi sínum; hetta *er* gáva Guðs.

20 Tí at hann skal ikki mikið minnast dagarnar av sínum lívi; av tí at Guð svarar *honum* í gleðini av hansara hjarta.

KAPITUL 6

TIL er ein ilska sum eg havi sæð undir sólini, og hon *er* algongd millum manna:

2 Ein maður, til hvørs Guð hevur givið ríkdómar, eyð, og

heiður, so at honum einkið vantar til sína sál av øllum sum hann tráar, tó gevur Guð honum ikki mátt til at eta harav, men ein fremmandur etur tað: hetta *er* fáfongd, og tað *er* ein óndur sjúkdómur.

3 ¶ Um ein maður giti hundrað *børn,* og livi mong ár, so at dagarnir av árum hansara verði mangir, og hansara sál verði ikki mettað við góðum, og eisini *at* hann onga jarðan havi; eg sigi, *at* ein burður, ikki komin av tíð, *er* betri enn hann.

4 Tí at hann kemur inn við fáfongd, og fer avstað í myrkri, og hansara navn skal verða hult við myrkri.

5 Harafturat hevur hann ikki sæð sólina, ella kent *nakað ting:* hesin hevur meiri hvílu enn hīn.

6 ¶ Ja, tó *at* hann livi eitt túsund ár tværreisur *tøld,* tó hevur hann einkið gott sæð: fara ikki allir til ēitt stað?

7 Alt strevið hjá manni *er* fyri munn hansara, og tó verður lysturin ikki mettaður.

8 Tí at hvat hevur hin vísi meir enn dárin? hvat hevur hin fátæki, sum skynar at ganga frammi fyri hinum livandi?

9 ¶ Betri *er* eygnanna sjón, enn reikan tráanarinnar: hetta *er* eisini fáfongd og ergran av anda.

10 Tað, sum hevur verið, er longu nevnt, og tað er vitað, at tað *er* maður: eiheldur kann hann stríða við hann sum er mektigari enn hann.

11 ¶ Við tað at tað veri *seg* mong ting sum økja um fáfongd, hvat *er* maður tess betri?

12 Tí at hvør veit hvat *er* gott hjá manni í *hesum* lívi, allar dagarnar av sínum fáfongda lívi sum hann brúkar sum ein skuggi? tí at hvør kann siga einum manni hvat skal verða eftir hann undir sólini?

KAPITUL 7

EITT gott navn *er* betri enn dýrabær salva; og deyðadagurin enn dagurin av ēins føðing.

2 ¶ *Tað er* betri at fara til húss harmingarinnar, enn at fara til húss veitslingarinnar: tí at tað *er* endi alra manna; og hin livandi vil leggja *tað* til hjarta síns.

3 Sorg *er* betri enn látur: tí við treganum av ásjónini verður hjartað gjørt betri.

4 Hjarta hinna vísu *er* í húsi harmingarinnar; men hjartað hjá dárum *er* í húsi kætisins.

5 *Tað er* betri at hoyra hartanina hjá tí vísa, enn hjá einum manni at hoyra songin hjá dárum.

6 Tí at eins og brakingin av tornum undir einum potti, soleiðis *er* láturin hjá dáranum: hetta eisini *er* fáfongd.

7 ¶ Vissuliga, kúgan ger ein vísan mann øran; og ein gáva oyðileggur hjartað.

8 Betri *er* endin av einum tingi enn byrjan tess: *og* hin tolni í anda *er* betri enn hin stolti í anda.

9 Ver ikki skundigur í tínum anda at verða firtin: tí at firtni hvílir í barmi dára˘.

10 Sig ikki tú, Hvør er *grundin fyri,* at hinir fyrru dagar vóru betri enn hesir? tí at tú spyrt *teg* ikki vísligani fyri viðvíkjandi hesum.

11 ¶ Vísdómur *er* góður við einum arvi: og *við honum er* gagn hjá teimum ið síggja sólina.

12 Tí at vísdómur *er* ein verja, *og* peningur *er* ein verja: men avbærleikin av kunnleika *er, at* vísdómur gevur lív til teirra sum hava hann.

13 Umhugsa Guðs verk: tí at hvør kann gera *tað* beint sum hann hevur gjørt krókut?

14 Á degi framgongdarinnar ver frødligur, men á mótburðardeginum umhugsa: Guð eisini hevur sett tann ēina yvir ímóti hīnum, til tess endamáls at maður einkið skuldi finna eftir seg.

15 Øll *ting* havi eg sæð í døgum fáfongdar mínar: til er ein rættlátur *maður* sum ferst í síni rættvísi, og til er ein vondur *maður* sum framleingir *sítt lív* í vondsku síni.

16 Ver ikki rættvísur ovurmikið; eiheldur ger teg sjálvan ovurvísan: hví skuldirt tú oytt teg sjálvan?

17 Ver ikki ovurmikið vondur, eiheldur veri tú dársamur: hví skuldirt tú doyð áðrenn tíð tína?

18 *Tað er* gott, at tú skuldirt taka hald á hesum; ja, eisini frá hesum hav ikki undan hond tína: tí at hann, sum óttast Guð, skal koma fram úr teim øllum.

19 Vísdómur styrkir hin vísa meiri enn tíggju mektigir *menn* sum eru í staðinum.

20 Tí at *til er* ikki ein rættlátur maður uppiá jørðini, sum ger gott, og syndar ikki.

21 Eisini gev einkið far um øll orð sum verða talað; at ikki tú hoyri tín tænara banna teg:

22 Tí at mangan eisini veit títt egna hjarta, at tú sjálvur líkaleiðis hevurt bannað aðrar.

23 ¶ Alt hetta havi eg roynt við vísdómi: eg segði, Eg vil vera vísur; men tað *var* fjart frá mær.

24 Tað sum er langt burturi, og avbera djúpt, hvør kann finna útav tí?

25 Eg setti í verk mítt hjarta at kenna, og at rannsaka, og at uppsøkja vísdóm, og orsøkina *til ting*, og at kenna vondskuna hjá fávitsku, enntá hjá dárskapi *og* ørskapi:

26 Og eg finni meiri beiska enn deyða kvinnuna, hvørs hjarta *er* snerrur og gørn, *og* hennara hendur *eins og* bond: hvør*i*ðso toknast Guði, skal komast undan frá henni; men syndarin skal verða tikin av henni.

27 Sí, hetta havi eg funnið, sigur prædikarin, *teljandi* ēitt eftir ēinum, til at finna útav úrslitinum:

28 Sum enn mín sál søkir, men eg finni ikki: ēin mann millum túsund havi eg funnið; men eina kvinnu millum alra teirra havi eg ikki funnið.

29 Sí, hetta einans havi eg funnið, at Guð hevur gjørt mann*in* reiðiligan; men teir hava uppsøkt mangar uppfinningar.

KAPITUL 8

HVØR *er* sum hin vísi *maður-in?* og hvør kennir týðingina av einum tingi? vísdómurin hjá einum manni fær hans andlit at skína, og djarvleikin av hans andliti skal verða broyttur.

2 Eg *ráði tær til* at halda boðið hjá kongi, og *tað* við atliti til eiðar Guðs.

3 Ver ikki skundigur at fara út úr eygsjón hans: statt ikki í einum óndum tingi; tí at hann ger hvatsumhelst honum hóvar.

4 Har, *ið* kongsorð *er, har er* máttur: og hvør kann siga við hann, Hvat gert tú?

5 Hvør*i*ðso heldur boðið, skal einkið ilt ting merkja: og hjartað hjá einum vísum manni greinar bæði tíð og dóm.

6 ¶ Av tí at til hvørja ráðagerð er tíð og dómur, tí *er* vesældómur mans*ins* mikil uppiá honum.

7 Tí at hann veit ikki tað sum verða skal: tí at hvør kann siga honum nær tað skal verða?

8 *Tað er* eingin maður sum hevur mátt yvir andanum, at afturhalda andan; eiheldur *hevur hann* mátt á deyðs-deginum: og *til er* eingin undanslepping í *tí* krígnum; eiheldur skal vondska bjarga teimum sum eru givnir til tess.

9 Alt hetta havi eg sæð, og sett í verk mítt hjarta at hvørjum verki sum verður gjørt undir sólini: *til er* ein tíð, í hvørji ēin maður stjórnar yvir einum øðrum til sítt egna mein.

10 Og soleiðis sá eg hinar vondu jarðaðar, sum vóru komnir og farnir frá plássi teirra heilagu, og teir vórðu gloymdir í staðinum, har teir so høvdu gjørt: hetta *er* eisini fáfongd.

11 Av tí at úrskurður ímóti einum illum verki verður ikki útintur skundigani, tí er hjartað hjá mannasonunum full*veg*is sett í teimum at gera ilt.

12 ¶ Tó *at* ein syndari geri ilt eitt hundrað ferðir, og hansara *dagar* verði framlongdir, tó vissuliga veit eg, at tað skal vera væl *statt* hjá teimum ið óttast Guð, sum óttast frammi fyri honum:

13 Men tað skal ikki vera væl *statt* hjá tí vonda, eiheldur skal hann framleingja *sínar* dagar, *sum eru* sum ein skuggi; av tí at hann óttast ikki frammi fyri Guði.

14 Tað er ein fáfongd sum verður gjørd uppiá jørðini; at tað veri rættlátir *menn,* hvørjum tað hendir samsvarandi við verk teirra vondu; *upp*aftur veri tað vondir *menn,* hjá hvørjum tað hendir samsvarandi við verk teirra rættvísu: eg segði, at hetta eisini *er* fáfongd.

15 Tá viðmælti eg kæti, av tí at ein maður hevur einkið betri ting undir sólini, enn at eta, og at drekka, og at vera glaður: tí at tað skal verða hjá honum av hansara strevi allar dagarnar av hansara lívi, sum Guð gevur honum undir sólini.

16 ¶ Tá ið eg setti í verk mítt hjarta at kenna vísdóm, og at síggja gerningin sum verður gjørdur uppiá jørðini: (tí at eisini *er til, sum* hvørki dag ella nátt sær svøvn við eygum sínum:)

17 Tá skoðaði eg alt Guðs verk, at ein maður kann ikki finna útav tí verki sum verður gjørt undir sólini: av tí at, tó *at* ein maður strevi *fyri* at grunda *tað* út, tó skal hann ikki finna *tað;* ja, víðari; tó *at* ein vísur *maður* hugsi at kenna *tað,* tó skal hann ei vera førur fyri at finna *tað*.

KAPITUL 9

FYRI alt hetta umhugsaði eg í mínum hjarta enntá at kunngera alt hetta, at teir rættvísu, og teir vísu, og teirra verk, *eru* í Guðs hond: eingin maður kennir hvørki kærleika ella hatur *av* øllum *sum er* frammi fyri teimum.

2 Øll *ting koma* líka til alra: *til er* ēin tilburður til hins rættvísa, og til hins vonda; til hins góða og til hins reina, og til hins óreina; til hansara sum sláturofrar, og til hansara sum sláturofrar ikki: eins og hin góði *er,* soleiðis *er* syndarin; *og* hann ið svør, sum *hann* ið óttast ein eið.

3 Hetta *er* ein ilska millum øll *ting,* sum verða gjørd undir sólini, at *tað finst* ēin tilburður innat øllum: ja, eisini hjartað hjá mannasonunum er fult av illum, og ørskapur *er* í teirra hjarta meðan teir liva, og eftir tað *fara teir* til hinna deyðu.

4 ¶ Tí at hjá honum, sum er sameinaður til alra hinna livandi, har er vón: tí ein livandi hundur er betri enn ein deyð leyva.

5 Tí hinir livandi vita, at teir skulu doyggja: men hinir deyðu vita ikki nakað ting, eiheldur hava teir meira eitt endurgjald; tí at minnið um teir er gloymt.

6 Eisini teirra kærleiki, og teirra hatur, og teirra øvund, er nú týnt; eiheldur hava teir meira ein skamt um ævir í nøkrum *tingi* sum verður gjørt undir sólini.

7 ¶ Far tín veg, et breyð títt við gleði, og drekk vín títt við kátum hjarta; tí at Guð nú góðtekur verk tíni.

8 Lat klæðir tíni vera altíð hvít; og lat høvdi tínum onga salvu tróta.

9 Liv frødligani við ektakonuni sum tú elskart, allar dagarnar av lívinum av tíni fáfongd, sum hann hevur givið tær undir sólini, allar dagarnar av tíni fáfongd: tí at tað *er* tín skamtur í *hesum* lívi, og í tínum strevi sum tú tekurt undir sólini.

10 Hvatsumhelst *ið* hond tín finnur at gera, ger *tað* við megi tíni; tí at *til er* einkið verk, ella uppáfund, ella kunnleiki, ella vísdómur, í grøvini, hvagar tú fert.

11 ¶ Eg vendi aftur, og sá undir sólini, at kapp*renn*ingin *er* ikki hjá teimum snaru, ella bardagin hjá teimum sterku, eiheldur tá breyð hjá teimum vísu, ella tá ríkdómar hjá skilamonnum, ella tá góðtokki hjá hegnismonnum; men tíð og tilvild hendir hjá teim øllum.

12 Tí at maður eisini kennir ikki tíð sína: eins og fiskarnir, sum verða tiknir í eitt ónt garn; og eins og fuglarnir, sum verða fangaðir í snerruni; soleiðis *verða* mannasynirnir snerraðir í eini óndari tíð, tá ið hon brádliga fellur uppá teir.

13 ¶ Henda vísdóm havi eg sæð eisini undir sólini, og hann *tóktist* mikil at mær:

14 *Tað var* ein lítil staður, og fáir menn fyri innan hann; og tað kom ein mikil kongur ímóti honum, og kringsetti hann, og bygdi mikil hervirkir ímóti honum:

15 Nú, tað fanst í honum ein fátækur vísur maður, og hann við sínum vísdómi útfríaði staðin; tó mintist eingin maður handa sama fátæka mann.

16 Tá segði eg, Vísdómur *er* betri enn styrki: hóast hetta, vísdómur hins fátæka mans *verður* vanvirdur, og hans orð verða ikki hoyrd.

17 Vís*manna* orð *verða* hoyrd í kvirri meiri enn geylið hjá honum sum stjórnar millum dára.

18 Vísdómur *er* betri enn krígsvápn: men ein syndari oyðileggur nógv gott.

Eygleiðingar av vísdómi og dárskapi:

KAPITUL 10

DEYÐAR flugur volda salvuni hjá apotekaranum at senda út ein stinkandi royk: *soleiðis ger eisini* eitt sindur av dárskapi hann sum er í umdømi fyri vísdóm *og* heiður.

2 Vísmans hjarta *er* við høgru hond hans; men dára hjarta við hans vinstru.

3 Ja eisini tá ið hann, sum er ein dári, gongur eftir veginum, svitast hansara vísdómur *honum*, og hann sigur til hvønn *og* ein, *at* hann *er* ein dári.

4 Um stjórnarans andi rísi upp ímóti tær, yvirgev ikki títt pláss; tí at eftirgeving friðarligger mikil brot.

5 Til er ein ilska *sum* eg havi sæð undir sólini, sum ein villfaring *sum* gongur út frá stjórnaranum:

6 Dárskapur verður settur í mikla tign, og hinir ríku sita í lágum plássi.

7 Eg havi sæð tænarar uppiá hestum, og prinsar gangandi sum tænarar uppiá jørðini.

8 Hann, ið grevur eina holu, skal detta inn í hana; og hvør*ið*so brýtur eina byrging, ein høggormur skal bíta hann.

9 Hvør*ið*so burtflytur steinar, skal verða skaddur harvið; *og* hann, ið klývur við, skal verða settur í vanda harav.

10 Um jarnið veri óhvast, og hann hvessi ikki eggina, tá má hann seta til meiri megi: men vísdómur *er* gagnligur at leiðbeina.

11 Vissuliga vil høggormurin bíta uttan gandakvøðing; og ein tvætlari er einkið betri.

12 Orðini av vísmans munni *eru* náðisom; men varrarnar á einum dára vilja svølgja upp sjálvan hann.

13 Byrjanin av orðum munns hans *er* dárskapur: og endin av hansara tosi *er* meinsamur ørskapur.

14 Ein dári eisini er fullur av orðum: ein maður dugir ikki *at* siga frá hvat verða skal; og hvat verða skal eftir hann, hvør dugir *at* siga honum?

15 Strev hinna dársomu møðir hvønn *og* ēin teirra, av tí at hann dugir ikki *at* fara til staðarins.

16 ¶ Vei til tín, O land, tá ið tín kongur *er* eitt barn, og tínir prinsar eta um morgunin!

17 Vælsignað *ert* tú, O land, tá ið tín kongur *er* sonurin hjá tignarmonnum og tínir prinsar eta í rættari tíð, til styrkis, og ikki til fyllskapar!

18 ¶ Við^ miklum leti ferst bygningurin; og gjøgn yrkisloysi handanna dryppar húsið ígjøgn.

19 ¶ Ein veitsla verður gjørd til látur, og vín ger gleimsamar: men peningur svarar øllum *tingum*.

20 ¶ Banna ikki kongin, nei, ikki í tíni hugsan; og banna ikki hin ríka í tínum seingjarkamari: tí ein fuglur luftarinnar skal bera røddina, og tað, sum hevur veingir, skal siga frá málinum.

KAPITUL 11

KASTA títt breyð uppá vøtnini: tí at tú skalt finna tað eftir mangar dagar.

2 Gev ein skamt til sjey, og eisini til átta; tí at tú veitst ikki hvat ilt skal verða uppiá jørðini.

3 Um skýggini veri *seg* full av regni, tøma tey *seg* uppá jørðina: og um træið falli ímóti suðuri, ella ímóti norðuri, í tí plássi, har træið fellur, har skal tað verða.

4 Hann, ið gáar eftir vindinum, skal ikki sáa; og hann, ið gevur *sær* far eftir skýggjunum, skal ikki heysta.

5 Eins og tú veitst ikki hvør vegur andans *er, ella* hvussu beinini *vaksa* í móðurlívinum á henni sum er við barn: enntá soleiðis veitst tú ikki verkini hjá Guði, sum[P] alt ger.

6 Um morgunin sáa títt sáð, og um kvøldið afturhalt ei tína hond: tí at tú veitst ikki hvørt blóma skal, antin hetta ella hatta, ella hvørt tey bæði *skulu vera* álíka góð.

7 ¶ Sanniliga *er* ljósið søtt, og eitt yndisligt *ting tað er* hjá eygunum at eygleiða sólina:

8 Men um ein maður livi mong ár, *og* fegnist í teim øllum; tó lat hann minnast til myrkursins dagar; tí at teir skulu vera mangir. Alt, sum kemur, *er* fáfongd.

9 ¶ Fegnast, O ungi maður, í tínum ungdómi; og lat títt hjarta kæta teg í døgum ungdóms tíns, og gakk í vegum hjarta tíns, og í sjón eygna tína: men viti tú, at fyri øll hesi *ting* vil Guð føra teg inn í dóm.

10 Tessvegna firra sorg frá hjarta tínum, og koyr burtur ilt frá holdi tínum: tí at barndómur og ungdómur *eru* fáfongd.

KAPITUL 12

MINST nú til Skapara tín í døgum ungdóms tíns, meðan hinir illu dagar komi ei, ella árini dragist nær, tá ið tú skalt siga, Eg havi ongan tokka í teim;

2 Meðan sólin, ella ljósið, ella mánin, ella stjørnurnar, veri ikki myrkjað, ella skýggini vendi aftur eftir regnið:

3 Í tí degi tá ið varðmenninir av húsinum skulu nøtra, og hinir sterku menn skulu boyggja seg, og malararnir *á kvørn* halda

uppat, av tí at teir eru fáir; og teir, sum hyggja út um gluggarnar, verði myrkjaðir;

4 Og hurðarnar skulu verða lokaðar í gøtunum, tá ið ljóðið av malingini er lágt, og hann skal rísa upp við ljóðið av fuglinum, og allar tónleiksins døtur skulu verða førdar lágt;

5 Eisini *tá ið* teir skulu vera ræddir fyri *tí sum er* høgt, og ræðslur *skulu vera* á veginum, og mandlutræið skal blómka, og grashoppan skal vera ein byrða, og tráan skal bila: av tí at maður fer til sítt lang*variga* heim, og harmararnir fara um gøturnar:

6 Áður *enn* nakrantíð silvur tráðurin verði loystur, ella hin gylta skál verði brotin, ella krukkan verði brotin við kelduna, ella hjólið brotið við veitina.

7 Tá skal støvið venda aftur til jarðarinnar, eins og tað var: og andin skal venda aftur at Guði, sum gav hann.

8 ¶ Fáfongda*nna* fáfongd, sigur prædikarin; alt *er* fáfongd.

9 Og harafturat, av tí at prædikarin var vísur, lærdi hann enn fólkið kunnleika; ja, hann gav væl gætur, og søkti upp, *og* legði til rættis mong orðtøk.

10 Prædikarin søkti at finna fram tokkasom orð: og *tað, sum varð* skrivað, *var* reiðiligt, *enntá* sannleiks orð.

11 Orðini hjá teimum vísu *eru* sum píkstavar; og sum naglar, festir *av* meistarunum hjá savnaðum, *sum* eru givin frá ēinum hirða.

12 Og framvegis, við hesum, sonur mín, ver ámintur: at gera nógvar bøkur *er* eingin endi á; og nógv studering *er* ein møðsemi hjá kjøtinum.

13 ¶ Latum okkum hoyra niðurstøðuna av øllum málinum: Óttast Guð, og halt boðini hjá honum: tí at hetta *er* øll *skyldan* hjá manni.

14 Tí at Guð skal føra hvørt verk inn í dóm, við hvørjum loyndum tingi, hvørt *tað veri seg* gott, ella hvørt *tað veri seg* ilt.

HÁSONGUR
SÁLOMONS.

KAPITUL 1

SONGANNA songur, sum *er* Sálomons.

2 Lat hann kyssa meg við kossum munns síns: tí at tín kærleiki *er* betri enn vín.

3 Vegna angan av tínum góðu smyrslum, *er* títt navn *sum* smyrsil helt út, tessvegna jomfrýrnar elska teg.

4 Drag meg, vit vilja renna eftir tær: kongurin hevur ført meg inn í kømur síni: vit vilja vera glaðar og fegnast í tær, vit vilja minnast tín kærleika meiri enn vín: hinar reiðiligu elska teg.

5 Eg *eri* svørt, men yndislig, O tit Jerusalems døtur, sum Kēdăr-s tjøld, sum Sálomons tjalddúkar.

6 Hyggið ikki uppá meg, av tí at eg *eri* svørt, tí at sólin hevur hugt uppá meg: børn móður mínar vóru firtin við meg; tey gjørdu meg *til* røkjara víngarðanna; *men* mín egna víngarð havi eg ikki røkt.

7 Sig mær, O tú sum sál mín elskar, hvar tú beitast, hvar tú fært *títt fylgi* at hvíla á middegi: tí at hví skuldi eg verið sum ēin sum vendir til viks hjá fylgjum felaga tína?

8 ¶ Um tú viti ikki, O tú vænasta millum kvenna, far tín veg út hjá fótafetum fylgisins, og føð tíni geitalomb við síðuna av tjøldum hirðanna.
9 Eg havi samanborið teg, O ástin mín, við ein flokk av hestum í vagnum Pharaohs.
10 Tínar kinnar eru yndisligar við røðum *av smúkkum,* tín hálsur við ketum *av gulli.*
11 Vit vilja gera tær kantar av gulli við knabbum av silvuri.
12 ¶ Meðan kongurin *situr* við borð sítt, sendir mín nardus-*salva* fram angan harav.
13 Eitt bundi av myrrhu *er* mín vælelskaði mær; hann skal liggja alla nátt ímilli bróst míni.
14 Mín háttelskaði *er* mær *sum* eitt tyssi av kamfúr í víngørðum Én-gē'-dī-s.
15 Sí, tú *ert* føgur, ástin mín; sí, tú *ert* føgur; tú *hevurt* dúgvuˇ eygu.
16 Sí, tú *ert* fagur, mín háttelskaði, ja, yndisligur: eisini okkara song *er* grøn.
17 Bjálkarnir av okkara húsi *eru* sedris, *og* okkara sperrur av furu.

KAPITUL 2

EG *eri* Sjâr'-ŏn-s rósa, *og* lilja dalanna.
2 Eins og liljan millum torna, soleiðis *er* ástin mín millum døtranna.
3 Eins og súreplatræið millum skógartræanna, soleiðis *er* mín háttelskaði millum sonanna. Eg settist niður undir hansara skugga við miklari fragd, og hansara frukt *var* søt fyri smakki mínum.
4 Hann førdi meg til veitsluborðhaldingar-húsið, og hansara bannari yvir mær *var* ást.
5 Styðjið meg við karaflum, troystið meg við súreplum: tí at eg *eri* sjúk av ást.
6 Hansara vinstra hond *er* undir høvdi mínum, og hans høgra hond umfevnir meg.
7 Eg áleggi tykkum, O tit Jerusalems døtur, við rádýrini, og við hindir akranna, at tit øsi ikki upp, ella veki *mín* kærleika, til honum lysti.
8 ¶ Røddin hjá háttelskaða mínum! sí, hann kemur leypandi uppiá fjøllunum, støkkandi uppiá heyggjunum.
9 Mín háttelskaði er eins og eitt rádýr, ella ein ungur hjørtur: sí, hann stendur aftanfyri múr okkara, hann hyggur út við gluggarnar, sýnandi seg sjálvan ígjøgnum rimaverkið.
10 Mín háttelskaði talaði, og segði við meg, Rís upp, ástin mín, hin væna mín, og kom avstað.
11 Tí at sí, veturin er umliðin, og regnið er yvirstaðið *og* farið;
12 Blomstrini birtast á jørðini; tíðin av synging *fugla* er komin, og røddin á turtildúgvuni hoyrist í landi várum;
13 Fikutræið setur fram sínar grønu fikur, og víntrøini, *við* tí mjúku víndrúvuni, geva ein *góðan* anga. Reis *teg,* ástin mín, hin væna mín, og kom avstað.
14 ¶ O dúgva mín, *sum ert* í klivum klettarins, í hinum loyndu *plássum* stíggjanna, lat meg sjá tína ásjón, lat meg hoyra tína rødd; tí at rødd tín *er* søt, og tín ásjón *er* yndislig.
15 Takið okkum revarnar, teir lítlu revarnar, sum spilla víntrøini: tí at okkara víntrø *hava* mjúkar víndrúvur.
16 ¶ Mín háttelskaði *er* mín, og eg *eri* hansara: hann beitast millum liljurnar.
17 Inntil *tað* lýsni fyri degi, og skuggarnir flýggi burtur, vend, mín háttelskaði, og vert tú eins og eitt rádýr, ella ein ungur hjørtur, uppiá Bethers fjøllum.

KAPITUL 3

UM nátt*ina* á míni song eg søkti hann, hvønn sál mín elskar: eg søkti hann, men eg fann hann ikki.

2 Eg vil rísa nú, og fara um staðin á gøtunum, og á teimum breiðu vegunum vil eg søkja hann, hvønn sál mín elskar: eg søkti hann, men eg fann hann ikki.

3 Varðmenninir, sum fara um staðin, funnu meg: *til hvørja eg segði,* Sóu tit hann, hvønn sál mín elskar?

4 *Tað var* bert eitt sindur sum eg fór framvið frá teimum, uttan *at* eg fann hann, hvønn sál mín elskar: eg helt honum, og vildi ikki lata hann fara, inntil eg hevði ført hann inn í hús móður mínar, og inn í kamarið hjá henni sum ól meg fram.

5 Eg áleggi tykkum, O tit Jerusalems døtur, við rádýrini, og við hindir akranna, at tit øsi ikki upp, ella veki *mín* kærleika, til honum lysti.

6 ¶ Hvør *er* hesin sum kemur út úr oyðuni, líka *sum* súlur av royki, anga*lagd*ur við myrrhu og roykilsi, við øllum handilsmansins pudrum?

7 Skoða hansara song, sum *er* Sálomons; trísinstjúgu reystmenni *eru* um hana, av Ísraels reystu.

8 Teir allir halda svørðum, *verandi* alroyndir í kríggi: hvør maður *hevur* sítt svørð uppiá lend síni, orsakað av ótta um náttina.

9 Sálomon kongur gjørdi sær ein vagn av viði Lī´-bă-nŏn-s.

10 Hann gjørdi hansara súlur *av* silvuri, hansara botn *av* gulli, dekkingina av honum *av* purpuri, hansara miðja verandi brúgvaløgd *við* ást, til Jerusalems døtur.

11 Farið fram, O tit Zions døtur, og skoðið kong Sálomon við krúnuni, hvarvið hansara móðir krýndi hann á degi trúlovinga hans, og á degi gleðis hjarta hansara.

KAPITUL 4

SÍ, tú *ert* føgur, ástin mín; sí, tú *ert* føgur; tú *hevurt* dúgvu˘ eygu fyri innan lokka tína: títt hár *er* sum eitt fylgi av geitum, sum birtast frá Gilead fjalli.

2 Tínar tenn *eru* sum eitt fylgi *av seyðum sum eru javnt* kliptir, sum komu upp frá tváttinum; hvarav hvør *og* ēin bera tvíburðar, og eingin *er* óburin teirra millum.

3 Tínar varrar *eru* sum ein tráður av skarlaki, og tín tala *er* dámlig: tínir tynningar *eru* sum eitt stykki av einum granatepli fyri innan lokka tína.

4 Tín hálsur *er* sum Dávids torn, bygt til eitt vápnahús, hvará tað hanga túsund smáskildir, allir skjøldrar hjá mektigum monnum.

5 Bróst tíni tvey *eru* sum tvey ung rádýr, sum eru tvíburðar, sum beitast millum liljurnar.

6 Inntil *tað* lýsni fyri degi, og skuggarnir flýggi burtur, vil eg fara mær til myrrhu fjallsins, og til roykilsis heyggjarins.

7 Tú *ert* øll føgur, ástin mín; *tað er* eingin blettur í tær.

8 ¶ Kom við mær frá Lī´-bă-nŏn, maki *mín,* við mær frá Lī´-bă-nŏn: hygg frá Á´-mâ-nă toppi, frá Sjē´-nīr-s og Hĕr´-mŏn-s toppi, frá ljónanna hellum, frá leopardanna fjøllum.

9 Tú hevurt bergtikið mítt hjarta, systir mín, maki *mín;* tú hevurt bergtikið mítt hjarta við ēinum av eygum tínum, við ēini ketu hálss tíns.

10 Hvør føgur er ást tín, systir mín, maki *mín!* hvør mikið betri er ást tín enn vín! og angin av

tínum smyrslum enn allar kryddurtir!

11 Tínar varrar, O maki *mín,* drúpa *sum* hunangskøkan: hunangur og mjólk *eru* undir tungu tíni; og angin av klæðum tínum *er* sum angin av Lí'-bă-nŏn.

12 Ein innilokaður urtagarður *er* systir mín, maki *mín;* ein lind lokað fyri, ein *inn*siglað kelda.

13 Tínar plantur *eru* ein granatepla frukturtagarður, við dámligum fruktum; kamfŭr, við nardus-*salvu,*

14 Nardus-*salvu* og safrăn; kalmus og kanel, við øllum roykilsistrøum; myrrhu og alŏeum, við øllum hinum fremstu kryddum:

15 Ein urtagarða-kelda, ein brunnur livandi vatna, og streymar frá Lī'-bă-nŏn.

16 ¶ Vakna, O norðanvindur; og kom, tú sunnan; blás omanyvir mín urtagarð, *at* hansara kryddurtir mega floyma út. Lat mín háttelskaða koma inn í sín urtagarð, og eta sínar dámligu fruktir.

KAPITUL 5

EG eri komin inn í mín urtagarð, systir mín, maki *mín:* eg havi savnað mína myrrhu við kryddi mínum; eg havi etið mína hunangskøku við hunangi mínum; eg havi drukkið mítt vín við mjólk míni: etið, O vinir; drekkið, ja, drekkið ríkiligani, O háttelskaðu.

2 ¶ Eg sovi, men hjarta mítt vakir: *tað er* røddin á háttelskaða mínum sum bankar, *sigandi,* Lat upp fyri mær, systir mín, ástin mín, dúgva mín, mín ódálkaða: tí at mítt høvur er fylt við døggi, *og* mínir lokkar við dropum náttarinnar.

3 Eg havi latið *meg* úr mínum kyrtli; hvussu skal eg lata *meg* í hann? eg havi tváað føtur mínar; hvussu skal eg dálka teir?

4 Mín háttelskaði koyrdi inn sína hond við holið *á hurðini,* og mínar *innan*goymslur vórðu rørdar yvir hann.

5 Eg reis upp at lata upp fyri háttelskaða mínum; og mínar hendur dryppaðu *við* myrrhu, og mínir fingrar *við* søtt-angandi myrrhu, uppiá hondtøkum lokunnar.

6 Eg læt upp fyri háttelskaða mínum; men mín háttelskaði hevði havt seg undan, *og* var farin: mín sál gav *seg* tá ið hann talaði: eg søkti hann, men eg kundi ikki finna hann; eg kallaði hann, men hann gav mær einkið svar.

7 Varðmenninir, sum fóru um staðin, funnu meg, teir slógu meg, teir særdu meg; múravørðirnir tóku burtur mítt slør frá mær.

8 Eg áleggi tykkum, O Jerusalems døtur, um tit finni mín háttelskaða, at tit sigi honum, at eg *eri* sjúk av ást.

9 ¶ Hvat *er* tín háttelskaði meir enn *ein annar* háttelskaður, O tú fagrasta millum kvenna? hvat *er* tín háttelskaði meir enn *ein annar* háttelskaður, at tú áleggurt okkum so?

10 Mín háttelskaði *er* hvítur og reydligur, hin fremsti millum tíggju túsund.

11 Hans høvur *er sum* hitt finasta gull, hansara lokkar *eru* buskutir, *og* svartir sum ein ravnur.

12 Hans eygu *eru* sum *eyguni* á dúgvum við løkirnar av vøtnum, tvigin við mjólk, *og* fittliga sett.

13 Hansara kinnar *eru* sum ein kryddurta song, *sum* søt blomstur: hansara varrar *sum* liljur, dryppandi søtt angandi myrrhu.

14 Hans hendur *eru sum* gullringar, settir við beryllinum: hansara kviður *er sum* bjart fílabein, yvirklætt *við* sapphīrum.

15 Hansara leggir *eru sum* súlur av marmori, settar uppá soklar av fínum gulli: hans ásjón *er* sum Lí´-bă-nŏn, frálík sum sedris*trøini*.

16 Hansara munnur *er* mest søtur: ja, hann *er* aldeilis yndisligur. Hesin *er* mín háttelskaði, og hesin *er* mín vinur, O Jerusalems døtur.

KAPITUL 6

HVAGAR er tín háttelskaði farin, O tú fagrasta millum kvenna? hvagar er tín háttelskaði vendur til viks? at vit mega søkja hann við tær.

2 Mín háttelskaði er farin oman í sín urtagarð, til kryddurta sengurnar, at beitast í urtagørðunum, og at savna liljur.

3 Eg *eri* háttelskaða míns, og mín háttelskaði *er* mín: hann beitast millum liljurnar.

4 ¶ Tú *ert* vøkur, O ástin mín, sum Tĭr´-zăh, yndislig sum Jerusalem, øgilig sum *ein herur* við bannarum.

5 Vend burt tínum eygum frá mær, tí at tey hava vunnið yvir mær: títt hár *er* eins og eitt fylgi av geitum sum birtast frá Gilead.

6 Tínar tenn *eru* eins og eitt fylgi av seyðum sum fara upp úr tváttinum, hvarav hvør *og* ēin ber tvíburðar, og *tað er* ikki ēin óburin teirra millum.

7 Eins og eitt stykki av einum granatepli *eru* tínir tynningar fyri innan lokka tína.

8 Tað eru trísinstjúgu drotningar, og fýrsinstjúgu medkonur, og jomfrúgvar uttan tal.

9 Mín dúgva, mín ódálkaða er *eittans* ēin; hon *er* hin *ēinasta* hjá móður síni, hon *er hin* úrvals hjá henni sum føddi hana. Døtrarnar sóu hana, og vælsignaðu hana; *ja,* drotningarnar og medkonurnar, og tær prísaðu henni.

10 ¶ Hvør *er* hon *sum* lítur fram sum morgunin, føgur sum mánin, klár sum sólin, *og* øgilig sum *ein herur* við bannarum?

11 Eg fór oman í nøtŭ-urtagarðin at síggja ávøkstir dalsins, *og* at sjá hvørt víntræið blómgaðist, *og* granattrøini blómaðu.

12 Áð*renn* eg nakrantíð var varugur, gjørdi mín sál meg *líka sum* Ăm-mĭn´-ă-dĭb-s vagnar.

13 Vend aftur, vend aftur, O Sjû-lă-mīt-*inn´-a;* vend aftur, vend aftur, at vit mega hyggja uppá teg. Hvat vilja tit síggja í Sjû-lă-mīt-*inn´*-uni? Sum var tað flokkin av tveimum herum.

KAPITUL 7

HVØR fagrir eru føtur tínir við skóm, O prinsdóttir! skoytini av tínum lendum *eru* líka *sum* skartgripir, verkið av hondunum hjá einum dugandi verkamanni.

2 Tín nalvi *er líka sum* eitt runt drekkibikar, *sum* vantar ikki likør: tín kviður *er líka sum* ein rúgva av hveiti, sett íkring við liljum.

3 Bróst tíni tvey *eru* líka *sum* tvey ung rádýr, *sum eru* tvíburðar.

4 Tín hálsur *er* eins og eitt fílabeins torn; tíni eygu *sum* fiskhyljarnir í Hĕsj´-bŏn, við Băth-răb´-bĭm-s portrið: tín nøs *er* eins og Lí´-bă-nŏn-s torn, sum lítur ímóti Damascus.

5 Títt høvur uppiá tær *er* líka *sum* Carmel, og hár høvurs tíns líka *sum* purpur; kongurin *er* hildin í svalagongunum.

6 Hvør føgur og hvør yndislig ert tú, O ástin, til fragda!

7 Hetta títt vakstrarlag er líkt við eitt pálmatræ, og tíni bróst við tyssir *av vínberjum.*

8 Eg segði, Eg vil fara niðan til pálmatræið, eg vil taka hald á tess bulum: nú eisini skulu bróst tíni vera sum tyssir av víntræ-

inum, og angin av tíni nøs sum súreplir;
9 Og gómin á tínum munni sum tað besta vínið til mína háttelskaðu, sum gongur *niður* søtligani, voldandi vørrunum hjá teimum sum sova at tala.
10 ¶ Eg *eri* háttelskaða míns, og hansara trá *er* mótvegis mær.
11 Kom, mín háttelskaði, lat okkum fara fram inná akurin; lat okkum halda til í bygdunum.
12 Lat okkum fara upp tíðliga til víngarðanna; lat okkum síggja um víntræið spretti, *hvørt* hin mjúka víndrúva birtist, *og* granat*trø*ini blómi fram: har vil eg geva tær mínar alskir.
13 Ástareplini geva ein anga, og við okkara portur˘ *eru* øll háttarløg av yndisligum *ávøkstum*, nýggjum og gomlum, *sum* eg havi lagt niðurfyri til tín, O mín háttelskaði.

KAPITUL 8

O AT tú *vart* sum bróðir mín, sum seyg bróst móður mínar! *tá ið* eg skuldi funnið teg fyri uttan, vildi eg kyst teg, ja, eg skuldi ei verðið vanvird.
2 Eg vildi leitt teg, *og* ført teg inn í hús móður mínar, *sum* vildi leiðbeint mær: eg vildi volt tær at drukkið av kryddaðum víni av vætu granateplis míns.
3 Hansara vinstra hond *skuldi verið* undir høvdi mínum, og hans høgra hond skuldi umfevnt meg.
4 Eg áleggi tykkum, O Jerusalems døtur, at tit øsi ikki upp, ella veki *mín* kærleika, inntil honum lysti.
5 Hvør *er* hendan sum kemur upp frá oyðuni, lenandi uppá sín háttelskaða? eg reisti teg upp undir súreplatræinum: har móðir tín førdi teg fram: har hon bar teg fram *sum* føddi teg.
6 ¶ Set meg sum eitt innsigli uppá hjarta títt, sum eitt innsigli uppá arm tín: tí at kærleiki *er* sterkur sum deyði; ástbrelni *er* grimm sum grøvin: kolini av tí *eru* kol˘ av eldi, *sum hevur* eina mest ógvusliga flammu.
7 Mong vøtn kunnu ikki sløkkja kærleika, eiheldur kunnu flóðirnar drukna hann: um ein maður vildi givið alt *figgjar*evni húss síns fyri kærleika, vildi tað fullkomiliga verðið vanvirt.
8 ¶ Vit hava eina lítlasystur, og hon hevur eingi bróst: hvat skulu vit gera fyri systur okkara á tí degi tá ið hon skal verða biðin um?
9 Um hon *veri* ein múrur, vilja vit byggja uppá hana eitt slott av silvuri: og um hon *veri* ein hurð, vilja vit inniloka hana við borðum av sedris.
10 Eg *eri* ein múrur, og míni bróst sum torn˘: tá var eg í eygum hansara sum ēin sum fann tokka.
11 Sálomon hevði ein víngarð í Bā´-ăl-hā´-mŏn; hann leigaði út víngarðin at røkjarum; hvør *og* ēin fyri ávøkstin av honum átti at koma við túsund *stykkjum* av silvuri.
12 Mín víngarður, sum *er* mín, *er* frammi fyri mær: tú, O Sálomon, *mást hava* túsund; og teir, sum varða ávøkstin av honum, tvey hundrað.
13 Tú, sum býrt í urtagørðunum, lagsbrøðurnir lýddu á rødd tína: vold mær at hoyra *hana*.
14 ¶ Ger skjótt, mín háttelskaði, og vert tú líkur við eitt rádýr ella við ein ungan hjørt uppiá kryddurta fjøllunum.

BÓK PROPHETSINS
ESAIAH.

KAPITUL 1

SJÓNIN hjá Esaiah Amoz syni, sum hann sá viðvíkjandi Judah og Jerusalem á døgum Uz´zi-ăh, Jó´thăm-s, Áhazar, *og* Hĕz-ĕki´-ăh, Judah konga.

2 Hoyrið, O himnar, og læn oyra, O jørð: tí at HARRIN hevur talað, Eg havi uppføtt og alt upp børn, og teir hava gjørt uppreist ímóti mær.

3 Oksin kennir sín eigara, og asnin krubbuna hjá sínum meistara: *men* Ísrael kennir ikki, fólk mítt umhugsar ikki.

4 Á, syndfulla tjóð; eitt fólk, løtt við misgerð; eitt sáð av illgerarum; børn, sum eru spillarar: teir hava yvirgivið HARRAN, teir hava tirrað Hin Heilaga Ísraels at firtni, teir eru farnir avstað aftureftir.

5 ¶ Hví skuldu tit verðið slignir meira? tit vilja gera uppreist meira og meira: alt høvdið er sjúkt, og alt hjartað ørmaktað.

6 Frá ilini á fótinum enntá at høvdinum *er* eingin sunnleiki í tí; *men* sár˘, og løstir, og upploysandi sár˘: tey eru ikki vorðin lokað, eiheldur bundin um, eiheldur linnað við salvu.

7 Tykkara land *er* oyði, tykkara staðir *eru* brendir við eldi: tykkara land, fremmandir upptæra tað í nærveru tykkara, og *tað er* oyði, sum kollrent av fremmandum.

8 Og Zions dóttir er eftirlatin sum ein smátta í einum víngarði, sum ein gistiskáli í einum agurkna-urtagarði, sum ein kringsettur staður.

9 Uttan HARRI herliðanna hevði eftirlatið okkum eina sera lítla leivd, skuldu vit havt verið sum Sodoma, *og* vit skuldu havt verið líkir Gō-mŏr´-rŭh.

10 ¶ Hoyrið HARRANS orð, tit stjórnarar Sodomu; lænið oyra at lóg Guðs várs, tit fólk Gō-mŏr´-rŭh.

11 Til hvat endamál *er* fjøldin av tykkara sláturofrum mær? sigur HARRIN: eg eri fullur av brenniofrunum av veðrum, og feittinum av mataðum djórum; og eg fragdist ikki í blóðinum av tarvum, ella av lombum, ella av geitarbukkum.

12 Tá ið tit koma til *tess* at birtast frammi fyri mær, hvør hevur kravt hetta av tykkara hond, at traðka forgarðar mínar?

13 Førið eingi fleiri fánýt tilbiðjanar-offur; roykilsi er mær ein andstygd; nýmánarnar og sabbatarnar, kallingina av savnaðum, kann eg ikki halda út; *tað er* misgerð, enntá hátíðar-fundurin.

14 Tykkara nýmánar og tykkara ásettu hátíðir hatar mín sál: tær eru ein trongd at mær; eg eri móður *av* at bera *tær*.

15 Og tá ið tit breiða fram tykkara hendur, vil eg fjala míni eygu frá tykkum: ja, tá ið tit gera mangar bønir, vil eg ikki hoyra: tykkara hendur eru fullar av blóði.

16 ¶ Tváið tykkum, gerið tykkum reinar; koyrið burtur hitt illa av tykkara gerðum frá frammanfyri eygum mínum; haldið uppat at gera ilt;

17 Lærið at gera gott; søkið dóm, lættið um hin kúgaða, dømið hin faðirleysa, førið søk fyri einkjuna.

18 Komið nú, og latum okkum røða saman, sigur HARRIN: hóast tykkara syndir veri sum

skarlak, skulu tær verða so hvítar sum snjó; tó *at* tær veri *seg* reyðar sum fagurreytt, skulu tær verða sum ull.

19 Um tit veri villigir og lýdnir, skulu tit eta hitt góða landsins:

20 Men um tit sýti og geri uppreist, skulu tit verða upptærdir við svørðinum: tí at muður HARRANS hevur talað *tað*.

21 ¶ Hvør er hin trúfasti staðurin vorðin ein skøkja! hann var fullur av dómi; rættvísi helt til í honum; men nú myrðarar.

22 Títt silvur er vorðið dreggj, títt vín blandað við vatn:

23 Tínir prinsar *eru* uppreistrarsamir, og lagsbrøður hjá tjóvum: hvør *og* ein elskar gávur, og fylgir eftir endurgjøldum: teir døma ikki hin faðirleysa, eiheldur kemur søk einkjunnar at teimum.

24 Tí sigur Harrin, HARRI herliðanna, Hin mektigi Ísraels, Á, eg vil linna mær á mínum mótstandarum, og hevna meg á mínar fíggindar:

25 ¶ Og eg vil venda míni hond uppá teg, og púra reinska burt dreggj títt, og taka burt alt títt tin:

26 Og eg vil endurbøta tínar dómarar sum í fyrstani, og tínar ráðgevarar sum at byrja við: síðan skalt tú verða kallaður, Rættvísisstaðurin, hin trúfasti staðurin.

27 Zion skal verða endurloyst við dómi, og hennara trúskiftingar við rættvísi.

28 ¶ Og oyðingin av misbrótarunum og syndarunum *skal verða* tilsaman; og teir, sum yvirgeva HARRAN, skulu verða upptærdir.

29 Tí at teir skulu skammast um eikirnar, sum tit hava tráað; og tit skulu verða fimlaðir vegna urtagarðarnar, sum tit hava valt.

30 Tí at tit skulu vera sum ein eik, hvørs leyv følnar; og eins og ein urtagarður, sum einkið vatn hevur.

31 Og hin sterki skal verða sum strýggj, og gerarin av tí eins og ein neisti, og teir skulu báðir brenna tilsaman, og eingin skal sløkkja *teir*.

KAPITUL 2

ORÐIÐ, sum Esaiah Amoz sonur sá viðvíkjandi Judah og Jerusalem.

2 Og tað skal bera á í hinum síðstu døgum, *at* fjallið av húsi HARRANS skal vera grundfest á fjallatoppinum, og skal vera upphevjað uppum heyggjarnar; og allar tjóðir skulu floyma at tí.

3 Og mong fólk skulu fara og siga, Komið tit, og latum oss fara niðan til fjalls HARRANS, til húsar Guðs Jákobs; og hann vil læra okkum um sínar vegir, og vit vilja ganga í leiðum hans: tí út úr Zion skal ganga út lógin, og HARRANS orð frá Jerusalem.

4 Og hann skal døma tjóðanna millum, og skal harta mong fólk: og teir skulu buka síni svørð yvirí plógjørn, og síni spjót yvirí urtagarðsknívar: tjóð skal ikki lyfta upp svørði ímóti tjóð, eiheldur skulu teir læra kríggj meira.

5 O hús Jákobs, komið tit, og latum oss ganga í ljósi HARRANS.

6 ¶ Tí hevurt tú yvirgivið fólk títt, hús Jákobs, av tí at teir veri *seg* fyltir upp úr eystri, og *eru* spásagnarmenn eins og Philistarnir, og teir nøkta seg í børnum fremmandra.

7 Teirra land eisini er fult av silvuri og gulli, eiheldur *er nakar* endi á dýrgripum teirra; teirra land er eisini fult av hestum, eiheldur *er nakar* endi á vagnum teirra:

8 Teirra land eisini er fult av avgudum; teir tilbiðja verk egnu handa sína, tað sum teirra egnu fingrar hava gjørt:

9 Og hin meinigi maðurin boyggir *seg* niður, og hin mikli

maðurin eyðmýkir seg: tessvegna fyrigev teimum ikki.

10 ¶ Innfar inn í klettin, og fjal teg í dustinum, av ótta fyri HARRANUM, og vegna dýrdina av hans hátign.

11 Hini hálátigu eygnabrá hjá manni skulu verða eyðmýkt, og hástórnin hjá monnum skal verða boygd niður, og HARRIN aleinaur skal vera upphevjaður í tí degi.

12 Tí at dagur HARRA herliðanna *skal vera* uppiá hvørjum *tí sum er* stoltur og hálátigur, og uppiá hvørjum *tí sum er* lyftur upp; og hann skal verða førdur lágt:

13 Og uppiá øllum Lī´-bă-nŏn-s sedris*trø*um, *sum eru* høg og lyft upp, og uppiá øllum Bá´-sjăn-s eiki*trø*um,

14 Og uppiá øllum teimum høgu fjøllunum, og uppiá øllum heyggjunum *sum eru* lyftir upp,

15 Og uppiá hvørjum høgum torni, og uppiá hvørjum girdum múri,

16 Og uppiá øllum skipunum úr Tarsjisj, og uppiá øllum dámligum myndum.

17 Og hálætni mans skal verða boygd niður, og hástórni mans skal verða gjørd lág: og HARRIN aleinaur skal vera upphevjaður í tí degi.

18 Og avgudarnar skal hann aldeilis gera til einkiðs.

19 Og teir skulu fara inn í holurnar av klettunum, og inn í hellini av jørðini, av ótta fyri HARRANUM, og vegna dýrdina av hans hátign, tá ið hann reisist at rista øgiligani jørðina.

20 Á tí degi skal ein maður kasta sínar avgudar av silvuri, og sínar avgudar av gulli, sum teir gjørdu *hvør og ēin* til sín sjálvs at tilbiðja, fyri moldvørpurnar og fyri flogmýsnar;

21 Til at fara inn í klivurnar av klettunum, og inn í topparnar av teimum rivutu klettum, av ótta fyri HARRANUM, og vegna dýrdina av hans hátign, tá ið hann reisist at rista øgiligani jørðina.

22 Lættið tit av frá manni, hvørs andadráttur *er* í hans nasum: tí at í hvørjum er hann at verða roknaður um?

KAPITUL 3

TÍ at sí, Harrin, HARRI herliðanna, tekur burt frá Jerusalem og frá Judah stuðulin og stavin, allan stuðulin av breyði, og allan stuðulin av vatni,

2 Hin mektiga mann, og krígsmannin, dómaran, og prophetin, og hin hygna, og hin elligamla,

3 Høvuðsmannin av fimti, og hin heiðursama mann, og ráðgevan, og hin hegniga listhandverkaran, og hin orðkringa røðumann.

4 Og eg vil geva børn *til at vera* teirra prinsar, og pinkubørn skulu stjórna yvir teimum.

5 Og fólkið skal verða kúgað, hvør *og* ēin av einum øðrum, og hvør *og* ēin av næsta sínum: barnið skal hátta sær stoltsligani ímóti tí elligamla, og hin niðarligi ímóti tí heiðurliga.

6 Tá ið ein maður skal taka hald á bróður sínum av húsi faðirs síns, *sigandi,* Tú hevurt klædnað, vert tú okkara stjórnari, og *lat* hesa toft *vera* undir hond tíni:

7 Á tí degi skal hann svørja, sigandi, Eg vil ikki vera ein grøðari; tí at í húsi mínum *er* hvørki breyð ella klædnaður: ger meg ikki *til* ein stjórnara fólksins.

8 Tí at Jerusalem er oydd, og Judah er fallin: av tí at teirra tunga og teirra gerðir *eru* ímóti HARRANUM, at upptirra eyguni av hans dýrd.

9 ¶ Sýnið av teirra ásjón vitnar ímóti teimum; og teir kunngera sína synd sum Sodoma, teir fjala

hana ikki. Vei teirra sál! tí at teir hava endurgoldið sær sjálvum ilt.
10 Sigið tit til hins rættvísa, at *tað skal vera* væl *statt hjá honum:* tí at teir skulu eta ávøkstin av gerðum sínum.
11 Vei tí vonda! *tað skal vera* illa *statt hjá honum:* tí at endurgjald handa hansara skal verða givið honum.
12 ¶ *Hvat viðvíkur* fólki mínum, børn *eru* teirra kúgarar, og kvinnur stjórna yvir teimum. O fólk mítt, tey, sum leiða teg, elva *tær* at fara skeivum, og oyða veg rása tína.
13 HARRIN stendur upp til *tess* at føra søk, og stendur til *tess* at døma fólkið.
14 HARRIN vil innfara inn í dóm við hinar elligomlu fólks síns, og prinsar tess: tí at tit hava etið upp víngarðin; ránið av tí fátæka *er* í húsum tykkara.
15 Hvat meina tit *við, at* tit berja fólk mítt í stykkir, og mylja andlitini á teimum fátøku? sigur Harrin GUÐ herliðanna.
16 ¶ Harafturat sigur HARRIN, Av tí at Zions døtur eru hástórar, og ganga við útstrektum hálsum og teymaleysum eygum, gangandi og trippandi *sum* tær fara, og gerandi eina glintan við fótum sínum:
17 Tí vil Harrin sláa við eini skurv krúnu høvurs døtra Zions, og HARRIN vil avdekka teirra loyniligu partar.
18 Á tí degi vil Harrin taka burtur dirvið av *teirra* glintandi prýðislutum *um teirra føtur,* og *teirra* hinnur, og *teirra* rundu høvuðprýðir líkasum mánin,
19 Keturnar, og armringarnar, og hálsturriklæðini,
20 Høvuðbúnarnar, og prýðislutir leggjanna, og høvuðbondini, og pláturnar, og oyrnaringarnar,
21 Ringarnar, og nasasmúkkurnar,
22 Hini skiftiligu dressini av skarti, og kapparnar, og høvuðlínini, og purlipinnarnar,
23 Glarini, og tað fína línið, og hetturnar, og slørini.
24 Og tað skal bera á, *at* ístaðin fyri søtan anga skal tað vera stinkur; og ístaðin fyri ein girðil, ein skræðing; og ístaðin fyri væl sett hár, skallutleiki; og ístaðin fyri eina bróstsmekku, ein gyrðing av sekkjaklæði; *og* bruni ístaðin fyri vakurleika.
25 Tínir menn skulu falla við svørðinum, og tínir mektigu í krígnum.
26 Og hennara portur skulu harma og vena; og hon, *verandi* oyðin, skal sita uppiá jørðini.

KAPITUL 4

OG í tí degi skulu sjey kvinnur tríva í ein mann, sigandi, Vit vilja eta okkara egna breyð, og vera í okkara egna klædnaði: einans lat okkum verða kallaðar við navni tínum, at taka burtur skemd okkara.
2 Í tí degi skal grein HARRANS vera vøkur og dýrdsom, og ávøkstur jarðarinnar *skal vera* avbærur og dámligur hjá teimum sum hava komist undan av Ísrael.
3 Og tað skal bera á, *at hann sum er* eftir í Zion, og *hann sum* verður verandi í Jerusalem, skal verða kallaður heilagur, *enntá* hvør tann sum er skrivaður hinna livandi millum í Jerusalem:
4 Tá ið Harrin skal hava tvigið burt skittin hjá Zions døtrum, og skal hava reinskað Jerusalems blóð frá tess mittu við dóms-andanum, og við brenningar-andanum.
5 Og HARRIN vil skapa uppiá hvørjum bústaði av Zion fjalli, og uppiá hennara savnaðum, eitt skýggj og royk um dag*in,* og skíningina av einum flammandi eldi um nátt*ina:* tí at uppiá allari dýrdini *skal vera* ein verja.

6 Og har skal vera eitt tabernakkul til ein skugga um dagsleitið frá hitanum, og til eitt skýlis-pláss, og til eina lívd frá stormi og frá regni.

KAPITUL 5

NÚ vil eg syngja fyri vælelskaða mínum ein song um mín háttelskaða viðvíkjandi víngarði hansara. Mín vælelskaði hevur ein víngarð á einum sera fruktagóðum heyggi:

2 Og hann gyrdi hann, og ruddi út steinar hansara, og plantaði hann við tí mest úrvals vínviðinum, og bygdi eitt torn í miðjum honum, og eisini gjørdi eina vínpersu harí: og hann væntaði, at hann skuldi bera fram víndrúvur, og hann bar fram villar víndrúvur.

3 Og nú, O íbúgvar av Jerusalem, og menn av Judah, dømið, eg biði tykkum, ímilli meg og víngarð mín.

4 Hvat kundi havt verðið gjørt meira við víngarð mín, sum eg ei havi gjørt í honum? hvørsvegna, tá ið eg væntaði, at hann skuldi bera fram víndrúvur, bar hann fram villar víndrúvur?

5 Og nú, komið nú; eg vil siga tykkum hvat eg vil gera við víngarð mín: eg vil taka burtur runnagirðing hansara, og hann skal verða etin upp; *og* bróta niður múr hansara, og hann skal verða traðkaður niður:

6 Og eg vil leggja hann *í* oyði: hann skal ei verða snidraður, ella grivin; og tað skulu koma upp tistlar og tornur: eg vil eisini ábjóða skýggjunum, at tey einkið regn regni uppá hann.

7 Tí at víngarðurin hjá HARRA herliðanna *er* Ísraels hús, og menninir av Judah hansara dámliga planta: og hann væntaði eftir dómi, men sí kúgan; eftir rættvísi, men sí eitt skríggj.

8 ¶ Vei teimum sum sameina hús til húss, *sum* leggja akur til akurs, til *tað verði* einkið pláss, at teir mega verða staðsettir einsamallir á miðjari jørðini!

9 Í míni oyru *segði* HARRI herliðanna, Av sonnum, mong hús skulu verða oyðin, *enntá* mikil og føgur, uttan íbúgva.

10 Ja, tíggju pløgilendir av víngarði skulu veita ëina bāth, og sáðið til eina hŏ́-mĕr skal veita eina ḗ-phŭh.

11 ¶ Vei teimum sum rísa upp árla um morgunin, *at* teir mega fylgja sterkum drykki; sum halda á inntil nátt, *til* vín uppflammi teir!

12 Og harpan, og sitārurin, tamburīnin, og pípa, og vín, eru í teirra veitslum: men teir gáa ikki eftir verki HARRANS, eiheldur umhugsa virknað handa hans.

13 ¶ Tí er mítt fólk farið inn í fangaskap, av tí at *teir* ongan kunnleika *hava:* og teirra heiðursomu menn *eru* úthungraðir, og teirra fjøld uppturkað við torsta.

14 Tí hevur helviti størrað um seg sjálva, og opnað sín munn uttan mát: og teirra dýrd, og teirra fjøld, og teirra skrúð, og hann ið fegnast, skulu stíga niður inn í tað.

15 Og hin meinigi maður skal verða førdur niður, og hin mektigi maður skal verða eyðmýktur, og eygu hinna hálátigu skulu verða eyðmýkt:

16 Men HARRI herliðanna skal vera upphevjaður í dómi; og Guð, sum er heilagur, skal vera halgaður í rættvísi.

17 Tá skulu lombini beitast eftir háttarlagi sínum, og hini oydnu pláss hinna feitu skulu fremmandir eta.

18 Vei teimum sum draga misgerð við fáfongdar-bondum; og synd, sum var tað við einum kerru reipi:

19 Sum siga, Lat hann gera skjótt *av, og* skunda sítt verk, at

vit mega sjá *tað:* og lat ráð Hins Heilaga Ísraels nærkast og koma, at vit mega kenna *tað!*

20 ¶ Vei teimum sum kalla ilt gott, og gott ilt; sum seta myrkur fyri ljós, og ljós fyri myrkur; sum seta beiskt fyri søtt, og søtt fyri beiskt!

21 Vei *teimum sum eru* vísir í egnu eygum sínum, og hygnir í egnu eygsjón síni!

22 Vei *teimum sum eru* mektigir til at drekka vín, og megnarmenn til at blanda sterkan drykk:

23 Sum rættvísgera hin vonda fyri endurgjald, og taka burt rættvísi hins rættvísa frá honum!

24 Tessvegna, eins og eldurin uppslúkar hálmin, og flamman upptærir dumbuna, *soleiðis* skal rót teirra vera sum rotinleiki, og teirra blóma skal fara upp sum dust: av tí at teir hava kastað burt lóg HARRA herliðanna, og vanvirt orð Hins Heilaga Ísraels.

25 Tí er HARRANS firtni kynd ímóti fólki hansara, og hann hevur rætt fram sína hond ímóti teimum, og hevur sligið teir: og heyggjarnir nøtraðu, og teirra ræ *vórðu* skrødd í miðjum strætunum. Fyri alt hetta er firtni hans ei vend burt, men hans hond *er* strekt út enn.

26 ¶ Og hann vil lyfta upp eitt merki fyri tjóðunum langt burturifrá, og vil fisa at teimum frá enda jarðarinnar: og sí, teir skulu koma við ferð fljótliga:

27 Eingin skal vera móður ella snáva teirra millum; eingin skal dúra ella sova; eiheldur skal gyrðilin á teirra lendum verða loystur, ella tvongin á teirra skóm verða brotin:

28 Hvørs ørvar *eru* hvassir, og allir teirra bogar spentir, hógvarnir á teirra hestum skulu verða roknaðir sum tinna, og teirra hjól sum ein meldurvindur:

29 Teirra ýling *skal vera* sum ein leyva, teir skulu ýla sum ungar leyvur: ja, teir skulu ýla, og leggja hald á ránið, og skulu bera *tað* avstað trygt, og eingin skal bjarga *tí*.

30 Og í tí degi skulu teir ýla ímóti teimum líka *sum* ýling havsins: og um *ēin* hyggi inn í landið, sí myrkur *og* sorg, og ljósið er myrkjað í himnum tess.

KAPITUL 6

Í TÍ árinum sum Uz´-zĭ-ăh kongur doyði, sá eg eisini Harran sitandi uppiá einum hásæti, høgur og lyftur upp, og hansara sleip fylti templið.

2 Uppiyvir tí stóðu sēr-â-phĭm´-arnir: hvør *og* ēin hevði seks veingir; við tveimum dekkaði hann andlit sítt, og við tveimum dekkaði hann føtur sínar, og við tveimum fleyg hann.

3 Og ēin rópti at øðrum, og segði, Heilagur, heilagur, heilagur, *er* HARRI herliðanna: øll jørðin *er* full av hans dýrd.

4 Og hurðarstavirnir fluttust fyri røddina á honum sum rópti, og húsið varð fylt við royki.

5 ¶ Tá segði eg, Eya meg! tí at tað er úti við mær; av tí at eg *eri* ein maður av óreinum vørrum, og eg dvøljist í miðjuni av einum fólki av óreinum vørrum: tí at míni eygu hava sæð Kongin, HARRA herliðanna.

6 Tá fleyg ēin av sēr-â-phĭm´-unum at mær, havandi eitt gløðandi kol í hond síni, *sum* hann hevði tikið við tongini oman av altarinum:

7 Og hann legði *tað* uppá munn mín, og segði, Sí, hetta hevur nortið við varrar tínar; og tín misgerð er tikin burtur, og synd tín reinskað.

8 Eg eisini hoyrdi rødd Harrans, sigandi, Hvønn skal eg senda, og hvør vil fara fyri okkum? Tá segði eg, Her *eri* eg; send meg.

9 ¶ Og hann segði, Far, og sig hesum fólki, Hoyrið tit í roynd *og veru,* men skiljið ikki; og síggið tit í roynd *og veru,* men varnist ikki.

10 Ger hjartað hjá hesum fólki feitt, og ger teirra oyru tung, og loka teirra eygu; at ikki teir síggi við eygum sínum, og hoyri við oyrum sínum, og skilji við hjarta sínum, og vendi um, og verði grøddir.

11 Tá segði eg, Harri, hvussu leingi? Og hann svaraði, Inntil staðirnir verði oyddir uttan íbúgva, og húsini uttan mann, og landið verði aldeilis oyði,

12 Og HARRIN havi firrað menn langt burtur, og *tað verði* ein mikil yvirgeving í miðjum landinum.

13 ¶ Men enn í tí *skal vera* ein tíggjund*arpartur,* og *hann* skal venda aftur, og skal verða etin: eins og eitt linditræ, og eins og ein eik, hvørs evni *er* í teimum, tá ið tey kasta *bløð síni: soleiðis skal* hitt heilaga sáð *vera* evni tess.

KAPITUL 7

OG tað bar á í døgum Áhazar Jó′thăm-s sonar, Ūz′zī-ăh sonar, kongs av Judah, *at* Rē′zĭn Sýriu kongur, og Pē′kăh Rĕ-măl′jăh sonur, kongur av Ísrael, fóru niðan ímóti Jerusalem at kriggjast ímóti tí, men kundu ei fá yvirvág ímóti tí.

2 Og tað varð sagt húsi Dávids, sigandi, Sýria er í samgongu við Ē′phră-ĭm. Og hansara hjarta varð rørt, og hjarta fólks hansara, eins og skógarins trø verða rørd við vindinum.

3 Tá segði HARRIN við Esaiah, Far fram nú at hitta Áhaz, tú, og Sjē′ār-jăsj′ūb, sonur tín, við endan av vatnleiðing hins ovara hyls, á alfaravegi *klædna*reinsarans akurs;

4 Og sig við hann, Ver varin, og ver kvirrur; óttast ikki, eiheldur ver veikhjartaður fyri teimum tveimum halunum av hesum rúkandi eld-faklunum, fyri tí øgiligu firtnini hjá Rē′zĭn við Sýriu, og hjá syni Rĕ-măl′jăh.

5 Av tí at Sýria, Ē′phră-ĭm, og sonur Rĕ-măl′jăh, hava lagt ill ráð ímóti tær, sigandi,

6 Latum okkum fara niðan ímóti Judah, og níva tað, og latum okkum gera eitt skarð harí til okkara, og seta ein kong í miðjuna av tí, *enntá* son Tá′bē-ăl-s:

7 Svá sigur Harrin GUÐ, Tað skal ikki standast, eiheldur skal tað bera á.

8 Tí at høvdið av Sýriu *er* Damascus, og høvdið av Damascus *er* Rē′zĭn; og innanfyri trísinstjúgu og fimm ár skal Ē′phră-ĭm verða brotið, at tað veri ikki eitt fólk.

9 Og høvdið av Ē′phră-ĭm *er* Să-mâr′ī-â, og høvdið av Să-mâr′ī-ŭ *er* Rĕ-măl′jăh sonur. Um tit vilji ikki trúgva, vissuliga skulu tit ikki verða grundfestir.

10 ¶ Harafturat talaði HARRIN aftur við Áhaz, sigandi,

11 Umbið tær eitt tekin av HARRANUM Guði tínum; umbið tað annaðhvørt í dýpdini, ella í hæddini í erva.

12 Men Áhaz segði, Eg vil ikki umbiðja, eiheldur vil eg freista HARRAN.

13 Og hann segði, Hoyrið tit nú, O Dávids hús; *Er tað* eitt lítið ting hjá tykkum at troytta menn, men vilji tit troytta Guð mín við?

14 Tí skal Harrin sjálvur geva tykkum eitt tekin; Sí, ein jomfrú skal ala fram, og føða ein son, og skal kalla navn hans Ĭm-mān′-û-ĕl.

15 Smør og hunang skal hann eta, at hann má skyna at havna tí illa, og velja tað góða.

16 Tí at áðrenn barnið skal skyna at havna tí illa, og velja tað góða, skal landið, sum tær stendst við, verða yvirgivið av báðum kongum hennara.

17 ¶ HARRIN skal føra uppá teg, og uppá fólk títt, og uppá hús faðirs tíns, dagar sum ei hava komið, frá tí degi ið Ē′phrā-ím fór avstað frá Judah; *enntá* kongin av Assýriu.

18 Og tað skal bera á í tí degi, *at* HARRIN skal fisa eftir fluguni sum *er* í tí ytsta partinum av áum Egyptalands, og eftir býfluguni sum *er* í Assýriulandi.

19 Og tær skulu koma, og skulu hvíla allar av teimum í teimum oydnu dølunum, og í holunum av klettunum, og uppiá øllum tornum, og uppiá øllum runnum.

20 Í tí sama degi skal Harrin raka við einum rakiknívi sum er leigaður, *nevniliga,* við^ teimum handan ánna, við^ konginum av Assýriu, høvdið, og fótahárið: og tað skal eisini upptæra skeggið.

21 Og tað skal bera á í tí degi, *at* ein maður skal uppihalda eina unga kúgv, og tveir seyðir;

22 Og tað skal bera á, fyri ríkiligleikan av mjólk, *sum* tey skulu geva, skal hann eta smør: tí at smør og hunang skal hvør tann eta sum er eftir í landinum.

23 Og tað skal bera á í tí degi, *at* hvørt pláss skal vera, har tað vóru túsund víntrø fyri túsund silvur*peningar,* tað skal *enntá* vera til tistlar og tornir.

24 Við ørvum og við bogum skulu *menn* koma hagar; tí at alt landið skal gerast tistlar og tornir.

25 Og *á* øllum heyggjum, sum skulu verða grivnir við hakkaranum, skal tað ikki koma hagar óttin fyri tistlum og tornum: men tað skal vera til sendingina fram av oksum, og til treðingina hjá minni fenaði.

KAPITUL 8

HARAFTURAT segði HARRIN við meg, Tak tær eina mikla rullu, og skriva í hana við einum mans penni viðvíkjandi Má′-hĕr-sjăl′-ăl-hăsj′-băz-i.

2 Og eg tók at mær trúføst vitnir at skráseta, Ū′-rī-ăh prest, og Zĕch-ăr′-jăh Jê-bĕr-ē-chī′-ăh son.

3 Og eg fór at prophetinnuni; og hon ól fram, og føddi ein son. Tá segði HARRIN til mín, Kalla navn hans Má′-hĕr-sjăl′-ăl-hăsj′-băz.

4 Tí at áðrenn barnið skal hava kunnleika til at rópa, Faðir mín, og móðir mín, skulu ríkidømini av Damascus og fongurin av Să-mâr′-ī-ŭ vera tikin burt frammi fyri konginum av Assýriu.

5 ¶ HARRIN talaði eisini við meg aftur, sigandi,

6 Við tað at hetta fólk havnar vøtnum Sjī-lō′-ăh, sum renna mjúkliga, og fegnast í Rē′-zīn og Rē-măl′-jăh syni;

7 Nú tessvegna, sí, Harrin førir upp uppá teir vøtn løkjarins, sterk og mong, *enntá* kongin av Assýriu, og alla dýrd hans: og hann skal koma upp yvir allar veitir hans, og fara yvir allar bakkar hans:

8 Og hann skal fara ígjøgnum Judah; hann skal floyma yvir og fara yvir, hann skal røkka *heilt* til hálsin; og strekkingin út av veingjum hansara skal fylla breiddina av landi tínum, O Ĭm-mān′-ū-ĕl.

9 ¶ Samlagið tykkum, O tit fólk, og tit skulu verða brotnir í stykkir; og lænið oyra, allir tit úr fjarskotnum londum: gyrðið tykkum, og tit skulu verða brotnir í stykkir; gyrðið tykkum, og tit skulu verða brotnir í stykkir.

10 Haldið ráðlegging saman, og tað skal koma til einkiðs; talið orðið, og tað skal ikki standast: tí at Guð *er* við okkum.

11 ¶ Tí at HARRIN talaði soleiðis til mín við eini sterkari hond, og leiðbeindi meg, at eg skuldi ikki ganga í vegi hesa fólks, sigandi,

12 Siga tit ikki, Ein samgonga,

til alra *teirra, til* hvørja hetta fólk skal siga, Ein samgonga; hvørki óttist tit ótta teirra, ella verðið ræddir.

13 Halgið HARRA herliðanna sjálvan; og *latið* hann *vera* ótta tykkara, og *latið* hann *vera* ønskur tykkara.

14 Og hann skal vera til ein halgidóm; men til ein snávingarstein og til ein meinbogaklett fyri báðum húsum Ísraels, til eina fellu og til eina snerru fyri íbúgvum Jerusalems.

15 Og mangir teirra millum skulu snáva, og falla, og verða brotnir, og verða snerraðir, og verða tiknir.

16 Bint saman vitnisburðin, innsigla lógina millum lærusveina mína.

17 Og eg vil bíða eftir HARRANUM, sum fjalir sítt andlit fyri húsi Jákobs, og eg vil vænta eftir honum.

18 Sí, eg og tey børn, hvørji HARRIN hevur givið mær, *eru* til tekin˘ og til undur˘ í Ísrael frá HARRA herliðanna, sum dvølist á Zion fjalli.

19 ¶ Og táið teir skulu siga við tykkum, Søkið innat teimum sum hava vælkunnugar andar; og innat gandakøllum sum pípa, og sum mutla: skuldi ikki eitt fólk søkja innat Guði sínum? fyri hinar livandi til hinna deyðu?

20 Til lógina og til vitnisburðin: um teir tali ikki samsvarandi við hetta orð, *er tað* av tí at *tað er* einkið ljós í teimum.

21 Og teir skulu fara ígjøgnum tað, illa fyrikomnir og svangir: og tað skal bera á, at tá ið teir skulu verða svangir, skulu teir ergra seg, og banna kong sín og Guð sín, og hyggja uppeftir.

22 Og teir skulu líta at jørðini; og sí trongd og myrkur, ræðsluniða; og *teir skulu verða* riknir til myrkurs.

KAPITUL 9

HÓAST hetta, niðan *skal* ei *vera* slík sum *var* í pláging hennara, tá ið at byrja við hann lættliga nívdi land Zĕ´-bŭ-lŏn-s og land Năph´-tâ-lī-s, og síðan meiri svárliga nívdi *hana við* sævarvegin, hīnumegin Jordan, í Galilēu tjóðanna.

2 Fólkið, sum gekk í myrkri, hava sæð eitt mikið ljós: teir, sum dvøljast í landi deyðsskuggans, uppá teir hevur ljósið skinið.

3 Tú hevurt margfaldað tjóðina, *og* ikki økt um frøina: teir frøast frammi fyri tær samsvarandi við frøina á heysti, *og* eins og *menn* fegnast tá ið teir skifta fongin.

4 Tí at tú hevurt brotið byrði oks hansara, og stav akslar hansara, og sprotan hjá kúgara hansara, sum á Mĭ´-dī-ăn-s degi.

5 Tí at hvør orrusta krígsmansins *er* við ørkymlaðum ljóði, og klæðum rullaðum í blóði; men *hetta* skal vera við brennu *og* eldsbrennievni.

6 Tí at barn er okkum føtt, sonur er okkum givin: og stjórnardømið skal vera uppiá øksl hans: og hansara navn skal vera kallað Undurfullur, Ráðgevi, Hin mektigi Guð, Ævigtvarandi Faðirin, Friðar Prinsurin.

7 Á økingini á *hansara* stjórnardømi og friði *skal* eingin endi *vera,* uppiá hásæti Dávids, og uppiá kongadømi hans, at skipa tað, og at grundfesta tað við dómi og við rættlæti hiðanífrá enntá um ævir. Vandlæti HARRA herliðanna vil útinna hetta.

8 ¶ Harrin sendi eitt orð inn í Jákob, og tað hevur lent uppiá Ísrael.

9 Og alt fólkið skal vita, *enntá* Ē´-phră-ĭm og íbúgvin av Să-mâr´-ĭ-ŭ, sum siga í stoltleika og seigsemi hjartans,

10 Tigulsteinarnir eru falnir
niður, men vit vilja byggja við
høgdum steinum: morberja*trø*ini
eru skorin niður, men vit vilja
broyta *tey til* sedris*trø*.
11 Tessvegna skal HARRIN seta
upp mótstandarar Rē´-zĭn-s ímóti
honum, og sameina hansara fíggindar saman;
12 Sýriulendingarnar frammanfyri, og Philistarnar aftanfyri; og
teir skulu uppslúka Ísrael við
opnum munni. Fyri alt hetta er
firtni hans ei vend burt, men
hans hond *er* strekt út enn.
13 ¶ Tí at fólkið vendir *sær* ikki
at honum sum slær tey, eiheldur
søkja tey HARRA herliðanna.
14 Tí vil HARRIN skera av frá
Ísrael høvd og hala, grein og sev,
í ēinum degi.
15 Hin elligamli og ærumikli,
hann *er* høvdið; og propheturin
sum frálærir lygnir, hann *er* halin.
16 Tí at leiðararnir hjá hesum
fólki volda *teimum* at fara skeivum; og *teir, sum verða* leiddir av
teimum, *verða* oyddir.
17 Tí skal Harrin onga frøi
hava í teirra ungu monnum, eiheldur skal *hann* hava miskunn
yvir teirra faðirleysu og einkjur:
tí at hvør *og* ēin *er* ein hyklari og
ein illgerari, og hvør muður talar
dárskap. Fyri alt hetta er firtni
hans ei vend burt, men hans
hond *er* strekt út enn.
18 ¶ Tí at vondska brennur
sum eldurin: hon skal upptæra
tistlarnar og tornir, og skal kynda
í kjarrum skógarins, og tey skulu
hevja *seg* upp *sum* lyftingin upp
av royki.
19 Gjøgnum vreiði HARRA herliðanna er landið myrkjað, og
fólkið skal vera sum brennievni
eldsins: eingin maður skal eira
bróður sínum.
20 Og hann skal rykkja til hinnar høgru handar, og vera svangur;
og hann skal eta til hinnar vinstru
handar, og teir skulu ei verða
mettaðir: teir skulu eta hvør maður kjøt egna arms síns:
21 Mă-năs´-sēh Ē´-phră-ĭm; og
Ē´-phră-ĭm Mă-năs´-sēh: *og* teir
saman *skulu vera* ímóti Judah.
Fyri alt hetta er firtni hans ei
vend burt, men hans hond *er*
strekt út enn.

KAPITUL 10

VEI teimum sum løgskipa
órættvísar løgskipanir, og sum
skriva herviligsemi *sum* teir hava
fyriskrivað;
2 At venda til viks hinar tørvandi frá dómi, og at taka burtur
rættin frá hinum ørmu av fólki
mínum, at einkjur mega vera teirra bráð, og *at* teir mega ræna hini
faðirleysu!
3 Og hvat vilja tit gera í heimsøkingar-deginum, og í oyðingini
sum skal koma fjar*vegis* frá? til
hvørs vilja tit flýggja eftir hjálp?
og hvar vilja tit eftirlata tykkara
dýrd?
4 Uttan meg skulu teir lúta
niður undir fangarnar, og teir
skulu falla undir hinar vignu.
Fyri alt hetta er firtni hans ei
vend burt, men hans hond *er*
strekt út enn.
5 ¶ O Assýriari, sproti firtni
mínar, og stavurin í teirra hond
er mín harmavreiði.
6 Eg vil senda hann ímóti eini
hyklariskari tjóð, og ímóti fólki
vreiði mínar vil eg geva honum
eina álegging, at taka herfongin,
og at taka býtið, og at traðka teir
niður sum evjuna í gøtunum.
7 Hvussu enn er, hann meinar
ikki so, eiheldur hugsar hansara
hjarta so; men *tað er* í hansara
hjarta at oyða og skera av tjóðir
— ei fáar.
8 Tí at hann sigur, *Eru* ikki
mínir prinsar aldeilis kongar?
9 *Er* ikki Că´l-nō eins og Câr´-chĕ-mīsj? *er* ikki Há´-măth eins

og Arpad? *er* ikki Să-mâr´-ĭ-â eins og Damascus?

10 Eins og hond mín hevur funnið kongadømir avgudanna, og hvørs ristu myndir bóru av teimum hjá Jerusalem og hjá Să-mâr´-ĭ-ŭ;

11 Skal eg ikki, eins og eg havi gjørt at Să-mâr´-ĭ-ŭ og avgudum hennara, soleiðis gera við Jerusalem og avgudar hennara?

12 Hvørsvegna tað skal bera á, *at* tá ið Harrin hevur útint alt sítt verk uppá Zion fjall og á Jerusalem, vil eg revsa ávøkstin av hinum bratta hjarta kongsins av Assýriu, og dýrdina av hans høgu eygnabráum.

13 Tí at hann sigur, Við^ styrki handar mínar havi eg gjørt *tað*, og við vísdómi mínum; tí at eg eri hyggin: og eg havi firrað markaskil fólksins, og havi rænt teirra dýrgripir, og eg havi sett av íbúgvarnar sum eitt reyst*menni:*

14 Og mín hond hevur funnið eins og eitt reiður ríkdómar fólksins: og eins og ēin savnar egg, *sum eru* eftir, havi eg savnað alla jørðina; og tað var eingin sum flutti vongin, ella opnaði munnin, ella pípaði.

15 Skal øksin reypa sær ímóti honum sum høggur við henni? *ella* skal sagin gera seg stóra ímóti honum sum rystir hana? sum um sprotin skuldi ryst *seg* ímóti teimum sum lyfta hann upp, *ella* sum um stavurin skuldi lyft upp *seg sjálvan*, *sum um hann* eingin viður *var*.

16 Tí skal Harrin, Harri herliðanna, senda soltni millum hinar feitu sínar; og undir dýrd síni skal hann kynda eina brennu, sum brennan av einum eldi.

17 Og Ísraels ljós skal vera fyri ein eld, og Hin Heilagi hans fyri eina flammu: og hon skal brenna og upptæra hansara tornir og hansara tistlar í ēinum degi;

18 Og skal upptæra dýrdina av hansara skógi, og av hansara fruktagóða akri, bæði sál og likam: og teir skulu vera sum tá ið ein merkisberi svímar.

19 Og restin av trøunum av hansara skógi skulu vera fá, at eitt barn má skriva tey.

20 ¶ Og tað skal bera á í tí degi, *at* leivdin av Ísrael, og slíkir sum hava komist undan av húsi Jákobs, skulu ei meira aftur styðjast uppá hann sum sló teir; men skulu styðjast uppá HARRAN, Hin Heilaga Ísraels, í sannleika.

21 Leivdin skal venda aftur, *enntá* leivdin av Jákobi, at hinum mektiga Guði.

22 Tí at tó *at* fólk títt Ísrael veri sum sandur havsins, *tó* skal ein leivd av teimum koma aftur: hin fyriskipaða upptæring skal floyma yvir við rættvísi.

23 Tí at Harrin GUÐ herliðanna skal gera eina upptæring, enntá avrádda, í miðjuni av øllum landinum.

24 ¶ Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ herliðanna, O fólk mítt, sum býrt í Zion, verið ikki ræddir fyri Assýriaranum: hann skal slá teg við einum sprota, og skal lyfta upp stavi sínum ímóti tær, eftir háttarlagi Egyptalands.

25 Tí at enn ein sera lítil stund, og harmavreiðin skal lætta av, og mín firtni í teirra oyðing.

26 Og HARRI herliðanna skal øsa upp ein koyril til hansara samsvarandi við slátran Mī´-dī-ăn-s við klett Ór´-ēb-s: og *eins og* hansara sproti *var* uppiá sjónum, soleiðis skal hann lyfta hann upp eftir háttarlagi Egyptalands.

27 Og tað skal bera á í tí degi, *at* hansara byrði skal verða tikin burt omanav tíni øksl, og hans ok omanav tínum hálsi, og okið skal verða oyðilagt orsakað av salvingini.

28 Hann er komin til Aî·äth,
hann hevur ferðast til Mïg·rön;
við Mïch·mäsj hevur hann lagt
upp sínar viðførningar:
29 Teir eru farnir yvir gjøgnum-
gongdina: teir hava tikið upp
sítt tilhald við Gē·bă; Rá·măh er
rædd; Gï·bē·äh Sauls er flýdd.
30 Lyft upp rødd tína, O Găl·
lïm·s dóttir: fá hana at verða
hoyrda at Lá·ïsj, O arma Án·ă-
thōth.
31 Măd·mē·năh er burtflutt;
íbúgvarnir av Gē·bïm savna seg
til at flýggja.
32 Sum enn *er* skal hann verða
verandi í Nôb tann dagin: hann
skal rysta sína hond *ímóti* fjalli
Zions dóttur, Jerusalems heyggi.
33 Sí, Harrin, HARRI herlið-
anna, skal kvetta bulin við ræð-
slu: og hinir høgu í vakstrarhædd
skulu verða høgdir niður, og hinir
hástóru skulu verða eyðmýktir.
34 Og hann skal skera niður
kjarrini av skóginum við jarni, og
Lï·bă·nōn skal falla við^ einum
mektigum ēinum.

KAPITUL 11

OG tað skal koma fram ein
sproti út úr stammu Ísais, og
ein Grein skal vaksa út úr rótum
hans:
2 Og andi HARRANS skal hvíla
uppiá honum, andi vísdóms og
vits, andi ráðs og kraftar, andi
kunnskapar og ótta HARRANS;
3 Og skal gera hann av kvikkum
skili í ótta HARRANS: og hann skal
ikki døma eftir sjón eygna sína,
eiheldur formana eftir hoyrn
oyrna sína:
4 Men við rættvísi skal hann
døma hinar ørmu, og írættaseta
við rættferð fyri hinar eyðmjúku
jarðarinnar: og hann skal sláa
jørðina við sprotanum av sínum
munni, og við andadráttinum av
sínum varrum skal hann vega hin-
ar vondu.
5 Og rættvísi skal vera gyrðilin
av hansara lendum, og trúskapur
gyrðilin av hansara nýrum.
6 Úlvurin eisini skal búgva hjá
lambinum, og leopardurin skal
leggja *seg* niður hjá geitarlamb-
inum; og kálvurin og hin unga
leyvan og gøðingurin tilsaman;
og eitt lítið barn skal leiða tey.
7 Og kúgvin og bjørnin skulu
beitast; hini ungi teirra skulu
leggja *seg* niður saman: og leyvan
skal eta strá sum oksin.
8 Og tað súgvandi barnið skal
spæla á holu eiturormsins, og tað
avvanda barnið skal koyra sína
hond á hellið hjá basiliskinum.
9 Teir skulu ikki meina, ella
oyðileggja, á øllum mínum heil-
aga fjalli: tí at jørðin skal vera full
av kunnleika HARRANS, eins og
vøtnini hylja sjógvin.
10 ¶ Og í tí degi skal vera ein
rót av Ísai, sum skal standa til eitt
hermerki hjá fólkinum; til henn-
ara skulu Heidningarnir søkja:
og hansara hvíla skal vera dýrd-
som.
11 Og tað skal bera á í tí degi,
at Harrin skal seta sína hond
aftur aðru ferðina til at vinna
aftur leivdina av sínum fólki, sum
skal vera eftir, frá Assýriu, og frá
Egyptalandi, og frá Păth·rōs, og
frá Cūsj, og frá Ē·lăm, og frá
Sjï·nâr, og frá Há·măth, og frá
oyggjum havsins.
12 Og hann skal seta upp eitt
hermerki fyri tjóðirnar, og skal
flykkja Ísraels útstoyttu, og savna
saman hinar spjaddu av Judah frá
hinum fýra hornum jarðarinnar.
13 Øvundin eisini hjá Ē·phrä-
ïm skal fara burtur, og mótstand-
ararnir av Judah skulu verða skor-
nir av: Ē·phrä·ïm skal ikki øvunda
Judah, og Judah skal ikki níva Ē·
phrä·ïm.
14 Men teir skulu flúgva uppiá
herðunum hjá Philistunum ímóti
vestri; teir skulu ræna teir úr

eystri saman: teir skulu leggja sína hond uppá Ē´-dóm og Móab; og Ammons børn skulu lýða teir.

15 Og HARRIN skal aldeilis oyða tungu hins Egyptiska sævar; og við sínum mektiga vindi skal hann rista sína hond yvir ánna, og skal sláa hana í hinar sjey streymar, og fáa *menn at* fara yvirum turrskøddar.

16 Og har skal vera ein alfaravegur til leivdina av hansara fólki, sum skal vera eftir, frá Assýriu; líka sum tað var fyri Ísrael á tí degi sum hann kom upp út úr Egyptalandi.

KAPITUL 12

OG í tí degi skalt tú siga, O HARRI, eg vil prísa tær: tó *at* tú vart firtin við meg, er tín firtni vend burtur, og tú uggaðirt meg.

2 Sí, Guð *er* mín frelsa; eg vil troysta, og ei vera ræddur: tí at HARRIN JĒ-HŌ´-VÄH *er* mín styrki og *mín* songur; hann eisini er vorðin mín frelsa.

3 Tessvegna við frøi skulu tit draga vatn burtur úr frelsunnar brunnum.

4 Og í tí degi skulu tit siga, Prísið HARRANUM, kallið uppá navn hans, kunngerið hansara gerðir millum fólksins, nevnið, at navn hans er upphevjað.

5 Syngið HARRANUM; tí at hann hevur gjørt framúrskarandi ting˘: hetta *er* kunnugt á allari jørðini.

6 Geyla út og rópa, tú íbúgvi Zions: tí at mikil *er* Hin Heilagi Ísraels í miðjum tær.

KAPITUL 13

BYRÐI Bábylons, sum Esaiah Amoz sonur sá.

2 Lyftið tit upp ein bannara uppiá hinum høga fjalli, hevjið røddini at teimum, ristið hondina, at teir mega fara inn í tignarmannanna portur.

3 Eg havi áboðið hinum halgaðu mínum, eg havi eisini kallað hinar mektigu mínar fyri vreiði mína, *enntá* teir sum fegnast í míni hásemi.

4 Ljóðið av eini fjøld á fjøllunum, líka sum av einum miklum fólki; eitt ófriðarlætisligt ljóð av kongadømum tjóða savnað saman: HARRI herliðanna mynstrar bardagans herlið.

5 Teir koma frá einum fjarskotnum landi, frá enda himins, *enntá* HARRIN, og vápnini av hans harmavreiði, at oyða alt landið.

6 ¶ Ýlið tit; tí at dagur HARRANS *er* fyri hond; hann skal koma sum ein oyðing frá hinum Almáttuga.

7 Tí skulu allar hendur vera ørmaktaðar, og hjartað hjá hvørjum manni skal bráðna:

8 Og teir skulu vera ræddir: verkir og sorgir skulu taka hald á teimum; teir skulu vera í pínu, eins og ein kvinna sum verkjast: teir skulu vera ógvaðir hvør við annan; teirra andlit *skulu vera sum* flammur.

9 Sí, dagur HARRANS kemur, grimmur, bæði við vreiði og ógvusligari firtni, at leggja landið oyði: og hann skal oyða tess syndarar úr tí.

10 Tí at stjørnur himins og stjørnustøðurnar harav skulu ei geva ljós sítt: sólin skal verða myrkjað í síni faring fram, og mánin skal ikki elva ljósi sínum at skína.

11 Og eg vil revsa heimin fyri *teirra* illa, og hinar vondu fyri teirra misgerð; og eg vil elva dramblæti hinna hugmóðigu at halda uppat, og vil leggja lágt hástórnina hjá hinum øgiligu.

12 Eg vil gera ein mann meiri dýrabæran enn fínt gull; enntá ein mann enn hin gylta kíla Ō´-phīr-s.

13 Tí vil eg rista himnarnar,

og jørðin skal burtflyta út úr plássi sínum, í vreiði HARRA herliðanna, og í deginum av hans ógvusligu firtni.

14 Og tað skal vera eins og hitt elta rádýr; og eins og ein seyður sum eingin maður tekur upp: teir skulu hvør maður venda til egna fólk sítt, og flýggja hvør *og* ēin inn í egna land sítt.

15 Hvør tann, ið verður funnin, skal verða stoyttur ígjøgn; og hvør tann, ið er sameintur *at teimum,* skal falla við ̂ svørðinum.

16 Teirra børn eisini skulu verða smekkaði í stykkir frammi fyri teirra eygum; teirra hús skulu verða rænd, og teirra konur neyðtiknar.

17 Sí, eg vil øsa upp Medarnar ímóti teimum, sum skulu ikki geva far um silvur; og *hvat* gulli *viðvíkur,* teir skulu ikki fragdast í tí.

18 *Teirra* bogar eisini skulu smekka hinar ungu menn í stykkir; og teir skulu onga várkunn hava við ávøksti móðurlívsins; teirra eyga skal ikki eira børnum.

19 ¶ Og Bábylon, dýrdin av kongadømum, vakurleikin av Chăl-dē´-anna avbærni, skal vera sum tá ið Guð kollrendi Sodomu og Gō-mŏr´-rŭh.

20 Tað skal aldri verða íbúgvið, eiheldur skal tað verða búð í frá ætt til ætt: eiheldur skal Arabarin sláa upp tjald har; eiheldur skulu hirðarnir gera sítt ból har.

21 Men villini djór úr oyðimørkini skulu liggja har; og teirra hús skulu vera full av grøtiligum skapningum; og uglur skulu búgva har, og skrímsl skulu dansa har.

22 Og hini villini oyggjanna djór skulu góla í teirra oydnu húsum, og drekar í *teirra* dámligu slottum: og hennara tíð *er* nær *við* at koma, og hennara dagar skulu ei verða framlongdir.

KAPITUL 14

TÍ at HARRIN vil hava miskunn á Jákob, og vil enn velja Ísrael, og seta teir í teirra egna land: og teir fremmandu skulu vera sameintir við teir, og teir skulu krøkja *seg* til húss Jákobs.

2 Og fólkið skal taka teir, og føra teir til teirra plass: og Ísraels hús skal ognast tey í landi HARRANS til tænarar og tænastumoyggjar: og teir skulu taka teir *til* fangar, hvørs fangar teir vóru; og teir skulu stjórna yvir kúgarum sínum.

3 Og tað skal bera á í tí degi sum HARRIN skal geva tær hvílu frá sorg tíni, og frá ótta tínum, og frá hinum harða trældómi, hvarí tú vart fingin at tæna,

4 ¶ At tú skalt taka upp hetta orðtak ímóti konginum av Bábylon, og siga, Hvør er kúgarin hildin uppat! hin gylti staður hildin uppat!

5 HARRIN hevur brotið stav teirra vondu, *og* sprotan hjá stjórnarunum.

6 Hann sum sló fólkið í vreiði við einum støðugum høggi, hann sum stjórnaði tjóðunum í firtni, verður atsóktur, *og* eingin forðar.

7 Øll jørðin er í hvíldar*støðu, og* er kvirr: teir bróta fram yvirí synging.

8 Ja, furutrøini fegnast yvir teg, *og* Lī´-bă-nŏn-s sedris*trø, sigandi,* Síðan tú ert lagdur niður, er eingin fellari komin niðan ímóti okkum.

9 Helviti frá í neðra er rørt fyri teg til at møta *tær* við tína komu: tað øsir upp hinar deyðu tín vegna, *enntá* allar hinar fremstu jarðarinnar; tað hevur reist upp frá teirra trónum allar kongar tjóðanna.

10 Allir teir skulu tala og siga við teg, Ert tú eisini vorðin veikur sum vit? ert tú vorðin líkur okkum?

11 Títt skrúð er fært niður til grøvina, *og* ljóðið av tínum stórfiólum: ormurin er spreiddur undir tær, og ormarnir dekka teg.
12 Hvør ert tú fallin frá himni, O Luçifer, sonur morgunsins! *hvør* ert tú høgdur niður til jarðarinnar, sum veiktirt tjóðirnar!
13 Tí at tú hevurt sagt í hjarta tínum, Eg vil stíga upp inn í himin, eg vil upphevja mítt hásæti uppum stjørnur Guðs: eg vil sita eisini uppiá fjalli samkomunnar, í síðum norðursins:
14 Eg vil stíga upp uppum hæddir skýggjanna; eg vil vera líka *sum* hin Hægsti.
15 Tó skalt tú verða førdur niður til helvitis, til síður holunnar.
16 Teir, sum síggja teg, skulu trongliga hyggja uppá teg, *og* umhugsa teg, *sigandi, Er* hetta maðurin sum fekk jørðina at skelva, sum risti kongadømir;
17 *Sum* gjørdi verøldina sum eina oyðu, og oyddi staðir hennara; *sum* opnaði ikki hús fanga sína?
18 Allir kongar tjóðanna, *enntá* allir av teimum, liggja í dýrd, hvør *og* ēin í sínum egna húsi.
19 Men tú ert kastaður út úr grøv tíni líka *sum* ein andstyggilig grein, *og eins og* klædnabúni teirra sum eru vignir, stoyttir ígjøgn við einum svørði, sum fara niður til steinar holunnar; sum eitt ræ, traðkað undir føtur.
20 Tú skalt ei verða sameintur við teir í jarðan, av tí at tú hevurt oytt land títt, *og* vigið fólk títt: sáðið hjá illgerarum skal aldri verða navnframt.
21 Fyribúgvið slátran til børn hansara fyri misgerðina hjá teirra fedrum; at teir rísi ikki, ella ognist landið, ella fylli ásjónina á verøldini við staðum.
22 Tí at eg vil rísa upp ímóti teimum, sigur HARRI herliðanna, og skera av frá Bábylon navnið, og leivd, og son, og bróðurson, sigur HARRIN.
23 Eg vil eisini gera tað *til* eina ogn hjá hegrinum, og hyljar av vatni: og eg vil sópa tað við rísakusti oyðingarinnar, sigur HARRI herliðanna.
24 ¶ HARRI herliðanna hevur svorið, sigandi, Vissuliga, eins og eg havi hugsað, soleiðis skal tað bera á; og eins og eg havi fyriætlað, *svá* skal tað standa:
25 At eg vil bróta Assýriaran í landi mínum, og uppiá mínum fjøllum traðka hann undir fót: tá skal ok hansara víkja oman av teimum, og hansara byrði víkja oman av teirra herðum.
26 Henda *er* ráðagerðin, sum er avrádd uppá alla jørðina: og henda *er* hondin, sum er strekt út uppá allar tjóðirnar.
27 Tí at HARRI herliðanna hevur avrátt, og hvør skal ógilda *tað?* og hans hond *er* strekt út, og hvør skal venda henni aftur?
28 Í tí árinum, sum kong Áhaz doyði, varð henda byrðin.
29 ¶ Fegnast ikki tú, alt Palestina, av tí at sproti hansara, sum sló teg, er brotin: tí at burtur úr høggormsins rót skal koma fram ein basiliskur, og hans ávøkstur *skal vera* ein eldsligur, fljúgvandi høggormur.
30 Og hinir frumbornu hjá hinum ørmu skulu mata *sær,* og hinir tørvandi skulu leggjast niður í tryggleika: og eg vil drepa tína rót við hungursneyð, og hann skal bana leivd tíni.
31 Ýl, O portur; geyla, O staður; tú, alt Palestina, *ert* uployst: tí at tað skal koma úr norðan ein roykur, og eingin *skal vera* einsamallur í ásettu tíðum hans.
32 Hvat skal *ēin* tá svara sendiboðum tjóðarinnar? At HARRIN hevur grundlagt Zion, og hini ørmu av hansara fólki skulu troysta á tað.

KAPITUL 15

BYRÐI Móabs. Av tí at um náttina er Âr hjá Móab lagt *í* oyði, *og* ført til tagnar; av tí at um náttina er Kir hjá Móab lagt *í* oyði, *og* ført til tagnar;

2 Hann er farin niðan til Bá´-jĭth, og til Dī´-bŏn, hini høgu pláss, at gráta: Móab skal ýla yvir Nĕ´-bō, og yvir Mĕ´-dĕ-bŭ: á øllum teirra høvdum *skal vera* skallutleiki, *og* hvørt skegg klipt av.

3 Í sínum strætum skulu teir gyrða seg við sekkjaklæði: á toppunum av húsum sínum, og í sínum strætum, skal hvør *og* ĕin ýla, grátandi ríkiliga.

4 Og Hĕsj´-bŏn skal rópa, og Ĕl-ĕ-ā´-lêh: teirra rødd skal verða hoyrd *enntá* at Já´-hăz: tí skulu teir vígbúnu hermenninir av Móab rópa út; hansara lív skal vera honum svárligt.

5 Mítt hjarta skal rópa út fyri Móab; hansara flóttamenn *skulu flýggja* at Zō´-âr, ein kvíga á tríggja vetra gomul: tí við niðanstíging Lŭ´-hĭth-s við gráti skulu teir fara hana upp; tí á vegi Hór-ô-nā´-ĭm-s skulu teir reisa upp eitt oyðingarróp.

6 Tí at Nimrims vøtn skulu verða oyðin: tí at hoyggið er følnað burtur, grasið svíkur, har er einkið grønt ting.

7 Tí skulu teir bera ríkiligsemina *sum* teir hava skaffað, og tað sum teir hava lagt niðurfyri, burtur til pílatræa-løkin.

8 Tí at rópið er farið rundan um mørkini av Móab; ýlingin av tí at Ēg´-lâ-ĭm, og ýlingin av tí at Bēēr-ē´-lĭm.

9 Tí at Dī´-mŏn-s vøtn skulu verða full av blóði: tí at eg vil føra meira omanyvir Dī´-mŏn, leyvur omanyvir hann sum kemst undan av Móab, og omanyvir landsins leivd.

KAPITUL 16

SENDIÐ tit lambið til stjórnara landsins frá Sĕ´-lă til oyðuna, at fjalli Zions dóttur.

2 Tí at tað skal verða, *at* eins og ein reikandi fuglur, kastaður út úr reiðrinum, *soleiðis* skulu Móabs døtur vera við vaðini av Arnon.

3 Halt ráðlegging, útinn dóm; ger tín skugga sum náttina á miðjum hádeginum; fjal hinar útstoyttu; avdúka ikki hann sum reikar.

4 Lat mínar útstoyttu búgva hjá tær, Móab; vert tú eitt skýli fyri teimum frá andliti rænarans: tí at peninganoyðarin er *komin* til ein enda, rænarin heldur uppat, kúgararnir eru upptærdir burtur úr landinum.

5 Og í miskunn skal hásætið verða grundfest: og hann skal sita uppiá tí í sannleika í tabernakli Dávids, dømandi, og søkjandi dóm, og skundandi rættvísi.

6 ¶ Vit hava hoyrt um hugmóð Móabs; *hann er* sera hugmóðigur: *enntá* um hástórni hans, og hugmóð hans, og vreiði hans: *men* hansara lygnir *skulu* ei *vera* soleiðis.

7 Tí skal Móab ýla yvir Móab, hvør *og* ĕin skal ýla: yvir grundvøllir Kir-hâr´-ĕ-sĕth-s skulu tit harmast; vissuliga *eru teir* slignir.

8 Tí at Hĕsj´-bŏn-s akrar kámast, *og* víntræ Sĭb´-măh-s: harrar hinna heidnu hava brotið niður hinar fremstu plantur hjá tí, teir eru komnir *enntá* at Jā´-zĕr, teir reikaðu *igjøgnum* oyðuna: hennara greinar eru strektar út, tær eru farnar yvirum sjógvin.

9 ¶ Tí vil eg gráta við Jā´-zĕr-s gráti *yvir* víntræ Sĭb´-măh-s: eg vil vatna teg við tárum mínum, O Hĕsj´-bŏn, og Ĕl-ĕ-ā´-lêh: tí at rópanin um tínar summar fruktir og um heyst títt er fallin.

10 Og gleði er tikin burtur, og frøi úr tí ríkiliga akrinum; og í víngørðunum skal eingin synging vera, eiheldur skal rópan vera: treðararnir skulu einkið vín treða út í persum *sínum;* eg havi fingið *teirra víngarðs* rópan at halda uppat.

11 Hvørsvegna mínir innvølir skulu ljóða eins og ein harpa fyri Móab, og mínir innvortis partar fyri Kír-hâr´-ēsj.

12 ¶ Og tað skal bera á, tá ið tað verður sæð at Móab er móður á hinum høga plássi, at hann skal koma til halgidóms síns at biðja; men hann skal ikki hava yvirvág.

13 Hetta *er* orðið, sum HARRIN hevur talað viðvíkjandi Móab, síðan ta tíð.

14 Men nú hevur HARRIN talað, sigandi, Innanfyri trý ár, eins og árini hjá einum leigusveini, og Móabs dýrd skal verða vanvird, við allari hasi miklu fjøld; og leivdin *skal vera* sera lítil *og* ússalig.

KAPITUL 17

BYRÐI Damascusar. Sí, Damascus verður tikin burtur frá *at vera* ein staður, og hann skal vera ein toftsamur dungi.

2 Staðir Á-rō-ĕr-s *eru* yvirgivnir: teir skulu vera til smáfæafylgir, sum skulu leggjast niður, og eingin skal gera *tey* rædd.

3 Festningurin eisini skal halda uppat frá Ē´-phrā-ĭm, og kongadømið frá Damascus, og leivdin av Sýriu: teir skulu vera sum dýrd Ísraels barna, sigur HARRI herliðanna.

4 Og á tí degi skal tað bera á, *at* Jákobs dýrd skal verða gjørd kløn, og feitleikin av hansara kjøti skal gerast visin.

5 Og tað skal vera sum tá ið skurðarmaðurin savnar kornið, og heystar øksini við sínum armi; og tað skal vera eins og hann sum savnar øks˘ í Rē´-phă-ĭm-s-dalinum.

6 ¶ Tó skulu fínhentingar-víndrúvur vera eftir í honum, eins og ristingin av einum olivintræi, tvey *ella* trý ber á toppinum av tí ovasta bulinum, fýra *ella* fimm í teimum ytstu fruktagóðu greinunum av tí, sigur HARRIN Guð Ísraels.

7 Á tí degi skal maður hyggja til Skapara síns, og hans eygu skulu hava fyrilit fyri Hinum Heilaga Ísraels.

8 Og hann skal ikki hyggja til altarini, verkið av hondum sínum; eiheldur skal meta *tað* sum hansara fingrar hava gjørt, hvørki lundirnar, ella myndirnar.

9 ¶ Á tí degi skulu hansara sterku staðir vera sum ein yvirgivin bulur, og ein ovasta grein, sum teir eftirlótu uppá grund av børnum Ísraels: og har skal vera oyðing.

10 Av tí at tú hevurt gloymt Guð frelsu tínar, og hevurt ikki verið minnugur um klett styrki tínar, tí skalt tú planta dámligar plantur, og skalt seta tað við fremmandum spírum:

11 Um dagin skalt tú fáa tína plantu at vaksa, og um morgunin skalt tú fáa sáð títt at blómka: *men* heystið *skal vera* ein dungi á deginum av harmi og av vónsprongdari sorg.

12 ¶ Vei til fjøldina av mongum fólki, *sum* gera eitt ljóð líka *sum* ljóðið av sjógvunum; og til súsið av tjóðum, *sum* gera eitt súslíka *sum* súsið av mektigum vøtnum!

13 Tjóðirnar skulu súsa sum súsið av mongum vøtnum: men *Guð* skal harta tær, og tær skulu flýggja langt burtur, og skulu verða eltar sum fjallanna dumba fyri vindinum, og sum eitt rullandi ting frammanfyri meldurvindinum.

14 Og sí um aftanstíð trongd; *og* áðrenn morgunin *er* hann ikki. Hetta *er* skamturin hjá teimum sum herja okkum, og luturin hjá teimum ið ræna okkum.

KAPITUL 18

VEI til landsins, skuggandi við veingjum, sum *er* handan áirnar av Ê-thï-ō´-pï-ŭ:

2 Sum sendir umboðsmenn eftir sjónum, enntá í farum av ljósasaksi uppiá vøtnunum, *sigandi*, Farið, tit skjótu sendisveinar, til tjóðar — spjødd og flust, til fólks — øgiligt frá síni byrjan higartil; ein tjóð — mátað upp og troðin niður, hvørs land áirnar hava spilt!

3 Allir tit íbúgvar veraldarinnar, og dvøljarar á jørðini, síggið tit, tá ið hann lyftir upp eitt *her*merki á fjøllunum; og tá ið hann blæsur ein lúður, hoyrið tit.

4 Tí at soleiðis segði HARRIN við meg, Eg vil fáa *mær* hvíld mína, og eg vil umhugsa í mínum býli sum ein klárur hiti uppiá urtum, *og* sum eitt døggarskýggj í heystarhitanum.

5 Tí at undan heystinum, tá ið knubbin er fullkomin, og hin súra víndrúva búnast í blómuni, skal hann bæði skera av kvistarnar við snidriknívum, og taka burtur *og* skera niður greinarnar.

6 Teir skulu verða eftirlætnir at fjallanna fuglum tilsaman, og til jarðarinnar djór˘: og fuglarnir skulu sumra uppiá teimum, og øll jarðarinnar djór skulu vetra uppiá teimum.

7 ¶ Á teirri tíð skal gávan verða førd HARRA herliðanna av einum fólki — spjaddum og flustum, og frá einum fólki — øgiligum frá síni byrjan higartil; ein tjóð — mátað upp og troðin undir fót, hvørs land áirnar hava spilt, til plássið hjá navni HARRA herliðanna, Zion fjallið.

KAPITUL 19

BYRÐI Egyptalands. Sí, HARRIN ríður uppiá einum skjótum skýggi, og skal koma inn í Egyptaland: og Egyptalands avgudar skulu verða fluttir fyri nærveru hans, og Egyptalands hjarta skal bráðna í miðju tess.

2 Og eg vil seta Egyptarnar ímóti Egyptunum: og teir skulu berjast hvør *og* ēin ímóti bróður sínum, og hvør *og* ēin ímóti næsta sínum; staður ímóti staði, *og* kongadømi ímóti kongadømi.

3 Og Egyptalands andi skal svitast í miðju tess; og eg vil oyða ráð tess: og teir skulu søkja til avgudanna, og til gandakvøðaranna, og til teirra sum hava vælkunnugar andar, og til gandakallanna.

4 Og Egyptarnar vil eg geva yvir í hondina á einum grimmum harra; og ein øgiligur kongur skal stjórna yvir teimum, sigur Harrin, HARRI herliðanna.

5 Og vøtnini skulu tvørra frá sjónum, og áin skal verða oydd og turkað upp.

6 Og teir skulu venda áunum langt burtur; *og* verndar-løkirnir skulu verða tømdir og turkaðir upp: sevini og størið skulu følna.

7 Pappír sevini við áarløkirnar, við munnan á áarløkunum, og hvørt ting, seymað við áarløkirnar, skal følna, verða rikið burtur, og vera ei *meira*.

8 Fiski*menn*inir eisini skulu syrgja; og allir teir, sum kasta ongul í áarløkirnar, skulu harma; og teir, sum breiða gørn uppá vøtnini, skulu fána.

9 Harafturat skulu teir, sum virka í fínari línurt, og teir, sum veva netverk˘, verða fimlaðir.

10 Og teir skulu verða brotnir í ráðagerðum tess, allir sum gera slúsur *og* hyljar til fisk.

11 ¶ Vissuliga, prinsarnir av Zō´-ăn *eru* dárar, ráðið hjá hinum vísu ráðgevum Pharaohs er vorðið óskynsamligt: hvussu siga tit við Pharaoh, Eg *eri* sonur hinna vísu, sonurin hjá fyrndarkongum?

12 Hvar *eru* teir? hvar *eru* tínir vísu *menn?* og lat teir siga tær nú, og lat teir vita hvat HARRI herliðanna hevur avrátt omanyvir Egyptaland.

13 Prinsarnir av Zō´-ăn eru vorðnir dárar, prinsarnir av Nōph eru villleiddir; teir hava eisini tølt Egyptaland, *enntá teir sum eru* stuðulin hjá tess ættargreinum.

14 HARRIN hevur blandað ein spiltan anda í miðju tess: og teir hava volt Egyptalandi at fara skeivum í hvørjum verki tess, eins og ein drukkin *maður* sløðrar í síni spýggju.

15 Eiheldur skal tað vera *nakað* verk hjá Egyptalandi, sum høvdið ella halin, greinin ella sevið, kann gera.

16 Á tí degi skal Egyptaland vera líkt kvinnum: og tað skal vera rætt og óttast uppá grund av ristingini av hond HARRA herliðanna, sum hann ristir yvir tað.

17 Og Judah land skal vera ein ræðsla yvirfyri Egyptalandi, hvør tann, sum nevnir um tað, skal vera ræddur í sær sjálvum, uppá grund av ráði HARRA herliðanna, sum hann hevur avrátt ímóti tí.

18 ¶ Á tí degi skulu fimm staðir í Egyptalandi tala tungumál Cānaans, og svørja til HARRA herliðanna; ēin skal verða kallaður, Oyðingarstaðurin.

19 Á tí degi skal vera eitt altar til HARRANS í miðjum Egyptalandi, og ein súla við mark tess til HARRANS.

20 Og tað skal vera til eitt tekin og til eitt vitni at HARRA herliðanna í Egyptalandi: tí at teir skulu rópa á HARRAN orsakað av kúgarunum, og hann skal senda teimum ein frelsara, og ein miklan ēin, og hann skal bjarga teimum.

21 Og HARRIN skal verða kendur fyri Egyptalandi, og Egyptarnir skulu kenna HARRAN á tí degi, og skulu gera sláturoffur og tilbiðjanar-offur; ja, teir skulu streingja eitt heiti at HARRANUM, og útinna *tað*.

22 Og HARRIN skal sláa Egyptaland: hann skal sláa og grøða *tað:* og teir skulu venda aftur *enntá* til HARRANS, og hann skal verða bønaður av teimum, og skal grøða teir.

23 ¶ Á tí degi skal tað vera ein alfaravegur úr Egyptalandi til Assýriu, og Assýriarin skal koma inn í Egyptaland, og Egyptin inn í Assýriu, og Egyptarnir skulu tæna við Assýriarunum.

24 Á tí degi skal Ísrael vera hin triðji við Egyptalandi og við Assýriu, *enntá* ein signing í miðjum landinum:

25 Hvørjar HARRI herliðanna skal vælsigna, sigandi, Vælsignað *veri* Egyptaland mítt fólk, og Assýria — verk handa mína, og Ísrael mín arvur.

KAPITUL 20

Í TÍ árinum sum Tartan kom at Ăsj´-dŏd, (tá ið Sâr´-gŏn, kongurin av Assýriu, sendi hann,) og bardist ímóti Ăsj´-dŏd, og tók tað;

2 Á hini somu tíð talaði HARRIN við Esaiah Amoz syni, sigandi, Far og loys sekkjaklæðið uttan av lendum tínum, og far úr tínum skógvi frá fóti tínum. Og hann so gjørdi, gangandi nakin og berføttur.

3 Og HARRIN segði, Líka sum tænari mín Esaiah hevur gingið nakin og berføttur *í* trý ár *til* eitt

tekin og undur omanyvir Egyptaland og omanyvir Ê-thĭ-ō´-pĭ-ŭ;
4 Soleiðis skal kongurin av Assýriu leiða burtur Egyptarnar *til* fangar, og Ê-thĭ-ō´-pĭ-ararnar *til* fangar, ungar og gamlar, naknar og berføttar, enntá við bøllum *sínum* avdekkaðum, Egyptalandi til skammar.
5 Og teir skulu vera ræddir og skammast um Ê-thĭ-ō´-pĭ-ŭ sína eftirvæntan, og um Egyptaland sína dýrd.
6 Og íbúgvin av hesi oynni skal siga á tí degi, Sí, slík *er* eftirvæntan okkara, hvagar vit flýggja eftir hjálp til at verða útfríaðir frá konginum av Assýriu: og hvussu skulu vit komast undan?

KAPITUL 21

BYRÐI oyðimarkar sævarins. Eins og meldurvindar í sunnan fara ígjøgnum; *soleiðis* kemur tað frá oyðimørkini, frá einum øgiligum landi.
2 Ein harmilig sjón er kunngjørd mær; hin sviksamligi handlarin handlar sviksamliga, og rænarin rænir. Far upp, O Ē´-lăm: kringset, O Mē´-dĭ-ă; alla tess suffan havi eg fingið at halda uppat.
3 Tí eru lendar mínar fyltar við pínu: verkir hava tikið hald uppá meg, sum verkirnir hjá eini kvinnu sum verkjast: eg varð boygdur niður við hoyringina *av tí;* eg varð mótfallin við sígginga *av tí.*
4 Mítt hjarta dukaði, óttafullsemi ræðslusló meg: náttina av míni fragd hevur hann vent mær yvirí ótta.
5 Tilreiðið borðið, *verið á* varðhaldi í varðtorninum, etið, drekkið: reisist, tit prinsar, *og* salvið skjøldurin.
6 Tí at svá hevur Harrin sagt við meg, Far, set ein varðmann, lat hann kunngera hvat hann sær.
7 Og hann sá ein vagn *við* einum pari av hestmonnum, ein vagn av asnum, *og* ein vagn av kamelum; og hann gav gætur dúgliga við miklari gáan:
8 Og hann rópti, Ein leyva: Mín harri, eg standi støðugt uppiá varðtorninum um dagsleitið, og eg eri setstur í mínum varðhaldi heilar nætur:
9 Og sí, her kemur ein vagnur av monnum, *við* einum pari av hestmonnum. Og hann tók til orða og segði, Bábylon er fallin, er fallin; og allar hinar ristu myndir av hennara gudum hevur hann brotið á jørðina.
10 O mín tresking, og korn gólvs míns: tað, sum eg havi hoyrt av HARRA herliðanna, Guði Ísraels, havi eg kunngjørt tykkum.
11 ¶ Byrðin hjá Dū´-măh. Hann kallar til mín úr Sē´-ĭr, Varðmaður, hvat um náttina? Varðmaður, hvat um náttina?
12 Varðmaðurin segði, Morgunin kemur, og eisini náttin: um tit vilji fregna, fregnið tit: vendið aftur, komið.
13 ¶ Byrðin uppiá Arabiu. Í skóginum í Arabiu skulu tit halda til, O tit ferðandi flokkar Dē´-dă-nĭm-s.
14 Íbúgvar Tē´-mă lands førdu vatn til hansara sum var tyrstur; honum, sum flýddi, komu teir á møti við sínum breyði.
15 Tí at teir flýddu frá svørðunum, frá tí drigna svørðinum, og frá tí spenta boganum, og frá herviligsemini av kríggi.
16 Tí at svá hevur Harrin sagt við meg, Innanfyri eitt ár, samsvarandi við árini hjá einum leigusveini, og øll Kē´-dăr-s dýrd skal svitast:
17 Og hitt eftirverandi av tali bogamannanna, hinir mektigu menn Kē´-dăr-s barna, skulu verða minkaðir um: tí at HARRIN Guð Ísraels hevur talað *tað.*

KAPITUL 22

BYRÐI sjóns-dalsins. Hvat bagir tær nú, at tú ert heil-*veg*is farin upp til húsatoppanna?
2 Tú sum ert fullur av røringum, ein ófriðarlætisamur staður, ein frødligur staður: tínir vignu *menn eru* ikki vignir við svørðinum, ella deyðir í bardaga.
3 Allir tínir stjórnarar eru flýddir tilsaman, teir eru bundnir av bogamonnunum: allir, sum eru funnir í tær, eru bundnir tilsaman, *sum* hava flýggjað langt burturifrá.
4 Tessvegna segði eg, Hyggið burtur frá mær; eg vil gráta beiskliga, strevist ikki *við* at ugga meg, orsakað av ræningini av dóttur fólks míns.
5 Tí at *tað er* ein dagur av trongd, og av niðurtraðkan, og av ørkymlan av Harranum GUÐI herliðanna í sjóns-dalinum, brótandi niður múrarnar, og av geylan til fjallanna.
6 Og Ē´-lăm bar ørvahúsan við vagnum av monnum *og* hestmonnum, og Kîr avhuldi skjøldurin.
7 Og tað skal bera á, *at* tínir mest úrvals dalar skulu vera fullir av vagnum, og hestmenninir skulu stilla seg sjálvar í uppstilling við portrið.
8 ¶ Og hann avhuldi Judah dekking, og tú hugdirt á tí degi til herbúnað skógarhússins.
9 Tit hava sæð eisini brestir staðar Dávids, at teir eru mangir: og tit savnaðu saman vøtn hins lægra hyls.
10 Og tit hava upptalt hús ˇ Jerusalems, og húsini hava tit brotið niður til at vígvirkja múrin.
11 Tit gjørdu eisini eina veit ímillum teir tveir múrarnar fyri vatn hins gamla hyls: men tit hava ikki litið til gerara hans, eiheldur havt fyrilit at honum sum snikkaði hann langt síðan.
12 Og á tí degi kallaði Harrin GUÐ herliðanna til grátingar, og til harmingar, og til skallutleika, og til gyrðingar við sekkjaklæði:
13 Og sí frøi og gleði, vegandi oksar, og drepandi seyð, etandi kjøt, og drekkandi vín: latum oss eta og drekka; tí at í morgin skulum vær doyggja.
14 Og tað varð opinberað í míni oyru av HARRA herliðanna, Vissuliga, henda misgerð skal ei verða reinskað frá tykkum til tit doyggi, sigur Harrin GUÐ herliðanna.
15 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ herliðanna, Far, slepp tær at hesum fæhirða, *enntá* at Sjëb´-nă, sum *er* yvir húsinum, *og sig,*
16 Hvat hevurt tú her? og hvønn hevurt tú her, at tú hevurt høgt tær út eitt gravhýsi her, *eins og* hann sum høggur sær út eitt gravhýsi á hæddi*ni, og* sum ristir eitt býli til sín sjálvs í ein klett?
17 Sí, HARRIN vil bera teg burt við einum mektigum fangaskapi, og vil vissuliga dekka teg.
18 Hann vil vissuliga harðliga venda *sær* og syfta teg *sum* ein bólt í eitt stórt land: har skalt tú doyggja, og har *skulu* vagnarnir av tíni dýrd *vera* skommin hjá húsi harra tíns.
19 Og eg vil reka teg frá tíni støð, og frá tíni støðu skal hann hála teg niður.
20 ¶ Og tað skal bera á í tí degi, at eg vil kalla mín tænara Ē´-lī-ă-kĭm Hĭl´-kī-ăh son:
21 Og eg vil klæða hann við skikkju tíni, og styrkja hann við gyrðli tínum, og eg vil líta upp tína stjórn inn í hond hansara: og hann skal vera ein faðir fyri íbúgvum Jerusalems, og fyri húsi Judah.
22 Og lykil húsar Dávids vil eg leggja uppá øksl hansara; so

hann skal lata upp, og eingin skal lata aftur; og hann skal lata aftur, og eingin skal lata upp.

23 Og eg vil festa hann *sum* ein nagla í eitt trygt plass; og hann skal vera til eitt dýrdsamt hásæti fyri húsi faðirs síns.

24 Og teir skulu hanga uppá hann alla dýrdina hjá húsi faðirs hans, avkomið og eftirkomingina, øll ker av lítlari nøgd, frá kerunum av bikørum, enntá til øll kerini av karaflum.

25 Á tí degi, sigur HARRI herliðanna, skal naglin, sum er festur í hinum trygga plássi, verða burtfluttur, og verða skorin niður, og falla; og byrðin, sum *var* uppiá honum, skal verða skorin av: tí at HARRIN hevur talað *tað*.

KAPITUL 23

BYRÐI Týrusar. Ýlið, tit skip úr Tarsjisj; tí at hann er lagdur *í* oyði, so at har er einkið hús, eingin innfaring inn: frá Chīt´-tīm-s landi er tað opinberað fyri teimum.

2 Verið stillir, tit íbúgvar oyggjarinnar; tú, sum handilsmenninir úr Zī´-dŏn, sum fara yvir sjógvin, hava fylt upp.

3 Og við^ miklum vøtnum *er* sáðið av Sī´-hôr, áarinnar heyst, hennara úrtøka; og hon er ein marknaður hjá tjóðum.

4 Vert tú skamm*full*, O Zī´-dŏn: tí at havið hevur talað, *enntá* styrki havsins, sigandi, Eg strevist ikki, ella beri fram børn, eiheldur fostri eg upp ungar menn, *ella* ali upp jomfrýr.

5 Eins og við frágreiðingina viðvíkjandi Egyptalandi, *soleiðis* skulu teir verða svárliga píndir við frágreiðingina um Týrus.

6 Farið tit yvir til Tarsjisj; ýlið, tit íbúgvar oyggjarinnar.

7 *Er* hetta tykkara frødligi *staður*, hvørs fornsemi *er* úr fyrndargomlum døgum? hennara egnu føtur skulu bera hana langt burtur at útisita.

8 Hvør hevur hildið hesa ráðlegging ímóti Týrus, tí krýnandi *staðinum*, hvørs handilsmenn *eru* prinsar, hvørs ferðasølumenn *eru* hinir heiðursomu jarðarinnar?

9 HARRI herliðanna hevur avrátt tað, at bletta hugmóðina hjá allari dýrd, *og* at føra inn í vanvirðing allar hinar heiðursomu jarðarinnar.

10 Far ígjøgnum land títt sum ein á, O Tarsjisj dóttir: *har er* ei meira styrki.

11 Hann strekti út sína hond yvir sjógvin, hann risti kongadømini: HARRIN hevur givið eina ábjóðan ímóti handils*staðinum*, at oyðileggja festningar hans.

12 Og hann segði, Tú skalt ei meira fegnast, O tú kúgaða jomfrú, Zī´-dŏn-s dóttir: reis *teg*, far yvir til Chīt´-tīm; har eisini skalt tú onga hvílu hava.

13 Sí Chăl-dē´-anna land; hetta fólk var ikki, *til* Assýriu*lending*urin grundlegði tað fyri teir sum dvøljast í oyðuni: teir settu upp tornini harhjá, teir reistu upp slottini harhjá; *og* hann førdi tað til oyðingar.

14 Ýlið, tit skip úr Tarsjisj: tí at tykkara styrki er løgd *í* oyði.

15 Og tað skal bera á í tí degi, at Týrus skal verða gloymdur *í* sjeyti ár, samsvarandi við dagarnar hjá ĕinum kongi: eftir endan á sjeyti árum skal Týrus syngja sum ein skøkja.

16 Tak eina hørpu, far um staðin, tú skøkja sum hevurt verðið gloymd; ger søtan melodí, syng nógvar sangir, at til tín má verða mint.

17 ¶ Og tað skal bera á eftir endan á sjeyti árum, at HARRIN vil vitja Týrus, og hon skal snúgva til hýru sína, og skal fremja hordóm við øllum kongadømum veraldarinnar uppiá ásjón jarðarinnar.

18 Og hennara handilsvøra og hennara hýra skal vera heilagleiki fyri HARRANUM: tað skal ei verða dýrgoymt, ella lagt niðurfyri; tí at hennara handilsvøra skal vera til teirra sum dvøljast frammi fyri HARRANUM, at eta nøktandi, og til haldgóðan klædnað.

KAPITUL 24

SÍ, HARRIN ger jørðina tóma, og ger hana oydna, og vendir henni upp *og* niður, og spjaðir umkring hennara íbúgvar.

2 Og tað skal verða, eins og við fólkinum, soleiðis við prestinum; eins og við tænaranum, soleiðis við meistara hansara; eins og við ternuni, soleiðis við matmóður hennara; eins og við keyparanum, soleiðis við seljaranum; eins og við útlánaranum, soleiðis við lænaranum; eins og við takaranum av fæleigu, soleiðis við gevaranum av fæleigu til hansara.

3 Landið skal verða fullkomiliga tømt, og fullkomiliga rænt: tí at HARRIN hevur talað hetta orðið.

4 Jørðin harmast *og* fánar burt, veroldin ørmaktast *og* fánar burt, hini hástóru fólk jarðarinnar ørmaktast.

5 Jørðin eisini er dálkað undir íbúgvum hennara; av tí at teir hava misbrotið lógirnar, broytt regluskipanina, brotið hin ævigtvarandi sáttmála.

6 Tí hevur banningin uppetið jørðina; og teir, sum búgva hará, eru ēinligir: tí verða jarðarinnar íbúgvar brendir, og fáir menn eftir.

7 Tað nýggja vínið harmast, víntræið ørmaktast, allir hinir káthjartaðu suffa.

8 Gleimurin av tamburīnum heldur uppat; ljóðið av teimum, sum fegnast, endar; frøin av hørpuni heldur uppat.

9 Teir skulu ikki drekka vín við einum sangi; sterkur drykkur skal vera beiskur fyri teimum sum drekka hann.

10 Ørkymlanar-staðurin er brotin niður: hvørt hús er lokað fyri, at eingin maður fær komið inn.

11 *Tað er* ein rópan eftir víni í gøtunum; øll frøi er myrkjað, landsins kæti er farið.

12 Í staðinum er eftirlatin avtofting, og portrið er sligið við oyðing.

13 ¶ Tá ið svá tað skal verða í miðjum landinum millum fólksins, *skal tað vera* sum skakingin av einum olivintræi, *og* sum fínhentingar-víndrúvurnar tá ið vínheystið er gjørt.

14 Teir skulu lyfta upp sína rødd, teir skulu syngja vegna hátign HARRANS, teir skulu rópa hart frá sjónum.

15 Hvørsvegna dýrðmetið tit HARRAN í eldunum, *enntá* navn HARRANS Guðs Ísraels í oyggjum havsins.

16 ¶ Frá hinum ytsta parti jarðarinnar hava vit hoyrt sangir, *enntá* dýrd til hins rættvísa. Men eg segði, Mín soltni, mín soltni, vei mær! hinir sviksomu handlarar hava handlað sviksamliga; ja, hinir sviksomu handlarar hava handlað sera sviksamliga.

17 Ótti, og holan, og snerran, *eru* uppiá tær, O íbúgvi jarðarinnar.

18 Og tað skal bera á, *at* hann, sum flýggjar frá ljóðinum av óttanum, skal falla inn í holuna; og hann, sum kemur upp burtur úr miðjuni av holuni, skal verða tikin í snerruni: tí at gluggarnir frá *tí* høga eru opnir, og grundvøllir jarðarinnar rista.

19 Jørðin er fullkomiliga brotin niður, jørðin er púra loyst upp, jørðin er flutt framúrliga.

20 Jørðin skal vingla til og frá sum ein drykkjumaður, og skal verða burtflutt líka *sum* ein smátta; og hennara misbrot skal

vera tungt uppiá henni; og hon skal falla, og ikki rísa aftur.

21 Og tað skal bera á í tí degi, *at* HARRIN skal revsa herlið hinna høgu *sum eru* á hædd*ini,* og kongar jarðarinnar uppiá jørðini.

22 Og teir skulu verða savnaðir saman, *eins og* fangar verða savnaðir í holuna, og skulu verða lokaðir fyri í fongslinum, og eftir mangar dagar skulu teir verða vitjaðir.

23 Tá skal mánin fjamskast, og sólin skammast, tá ið HARRI herliðanna skal ríkja á Zion fjalli, og í Jerusalem, og frammi fyri sínum fyrndargomlu dýrdsamliga.

KAPITUL 25

O HARRI, tú *ert* Guð mín; eg vil upphevja teg, eg vil prísa navni tínum; tí at tú hevurt gjørt undurfullar *lutir; tíni* ráð úr fordum *eru* trúskapur *og* sannleiki.

2 Tí at tú hevurt gjørt úr einum staði ein dunga; *úr* einum vardum staði eina toft: eitt slott hjá fremmandum til eingin staður at vera; hann skal aldri verða bygdur.

3 Tí skal tað sterka fólkið dýrðmeta teg, staður hinna ræðuligu tjóða skal óttast teg.

4 Tí at tú hevurt verið ein styrki hjá tí arma, ein styrki hjá hinum tørvandi í neyð hansara, eitt skjól frá storminum, ein skuggi frá hitanum, tá ið blástur hinna ræðuligu *er* sum ein stormur *ímóti* múrinum.

5 Tú skalt føra niður ljóðið av fremmandum, sum hitan í einum turrum plássi; *enntá* hitan við skugganum av einum skýggi: grein teirra ræðuligu skal verða førd lágt.

6 ¶ Og á hesum fjalli skal HARRI herliðanna gera øllum fólki eina veitslu av feitum tingum, eina veitslu av vínum á berskakunum, av feitum tingum — full av mergi, av vínum á berskakunum — væl edlað.

7 Og hann vil oyða á hesum fjalli ásjón dekkingarinnar — kastað yvir alt fólk, og slørið sum er breitt yvir allar tjóðir.

8 Hann vil svølgja upp deyða í siguri; og Harrin GUÐ vil turka burt tár burtur av øllum andlitum; og hartan fólks síns skal hann taka burt oman av jørðini: tí at HARRIN hevur talað *tað*.

9 ¶ Og tað skal verða sagt á tí degi, Sí, hesin *er* Guð vár; vit hava væntað eftir honum, og hann vil frelsa okkum: hesin *er* HARRIN; vit hava væntað eftir honum, vit vilja vera glaðir og fegnast í frelsu hansara.

10 Tí at á hesum fjalli skal hond HARRANS hvíla, og Móab skal verða troðin niður undir honum, enntá sum hálmur verður troðin niður til tøðrúgvuna.

11 Og hann skal breiða fram sínar hendur í miðjum teimum, eins og hann, ið svimur, breiðir fram *sínar hendur* til at svimja: og hann skal føra niður teirra hugmóð tilsaman við herfongunum av teirra hondum.

12 Og festningin av hinum høga virki av múrum tínum skal hann føra niður, leggja lágt, *og* føra til jørðina, *enntá* til støvið.

KAPITUL 26

Á TÍ degi skal hesin sangur verða sungin í Judah landi; Vit hava ein sterkan stað; frelsu vil *Guð* útnevna *til* múrar og hervirkir.

2 Opnið tit portrini, at hin rættvísa tjóð, sum varðveitir sannleikan, kann innfara inn.

3 Tú vilt halda *honum* í fullkomnum friði, *hvørs* sinni *er* styðjað *á teg:* av tí at hann lítur á teg.

4 Lítið tit á HARRAN um ævir: tí at í HARRANUM JE-HÓ´-VAH *er* ævigtvarandi styrki:

5 ¶ Tí at hann førir niður teir sum búgva á hæddini; hin hálátiga stað, hann leggur hann lágt; hann leggur hann lágt, *enntá* til jørðina; hann førir hann *enntá* til støvið.

6 Fóturin skal traðka hann niður, *enntá* føtur hins arma, *og* fetini hjá hinum tørvandi.

7 Vegur hins rættláta *er* reiðiligsemi: tú, mest reiðiligi, vigart leiðir hins rættláta.

8 Ja, á vegi dóma tína, O HARRI, hava vit væntað eftir tær; tráin hjá *okkara* sál *er* til navn títt, og til endurminningina um teg.

9 Við míni sál havi eg tráað teg um náttina; ja, við mínum anda innan í mær vil eg søkja teg árla: tí at tá ið tínir dómar á jørðini *eru,* vilja íbúgvar veraldarinnar læra rættvísi.

10 Lat góðtokka verða sýndan mót hinum vonda, *tó* vil hann ei læra rættvísi: í reiðiligseminnar landi vil hann handla órættlátliga, og vil ikki skoða hátign HARRANS.

11 HARRI, *tá ið* tín hond er lyft upp, vilja teir ei síggja: *men* teir skulu síggja, og skammast fyri *sína* øvund inná fólkið; ja, eldur fígginda tína skal upptæra teir.

12 ¶ HARRI, tú vilt fyriskipa frið til okkara: tí at tú eisini hevurt virkað øll okkara verk í okkum.

13 O HARRI Guð vár, *aðrir* harrar umframt teg hava havt harradømi yvir okkum: *men* við teg einans vilja vit nevna títt navn.

14 *Teir eru* deyðir, teir skulu ikki liva; *teir eru* andaðir, teir skulu ikki rísa: tí hevurt tú heimsøkt og oytt teir, og fingið alt teirra minni at týnast.

15 Tú hevurt økt um tjóðina, O HARRI, tú hevurt økt um tjóðina: tú ert dýrðmettur: tú hevðirt firrað *hana* fjart *at* øllum endum jarðarinnar.

16 HARRI, í trongd hava teir vitjað teg, teir heltu út eina bøn *tá ið* tín aging *var* uppiá teimum.

17 Líka sum ein kvinna við barn, *sum* dregst nær tíðini av síni útfrían, er í pínu, *og* rópar út í verkjum sínum; soleiðis hava vit verið í tíni eygsjón, O HARRI.

18 Vit hava verið við barn, vit hava verið í pínu, vit hava sum var tað ført fram vind; vit hava ikki virkað nakra útfrían á jørðini; eiheldur hava íbúgvar veraldarinnar fallið.

19 Tínir deyðu *menn* skulu liva, *tilsaman við* mínum deyða likami skulu teir reisast. Vaknið og syngið, tit sum búgva í støvi: tí at døgg tín *er sum* døggin av urtum, og jørðin skal kasta út hinar deyðu.

20 ¶ Kom, fólk mítt, innfar tú inn í kømur tíni, og loka hurðar tínar um teg: krógva teg sum var tað í eitt lítið bil, inntil harmavreiðin verði yvirstaðin.

21 Tí at sí, HARRIN kemur út úr plássi sínum at revsa íbúgvar jarðarinnar fyri teirra misgerð: jørðin eisini skal avdúka sítt blóð, og skal ei meira hylja sínar vignu.

KAPITUL 27

Á TÍ degi skal HARRIN, við sínum svára og mikla og sterka svørði, revsa lē´-vī-ă-thăn — hin gatandi dreka, enntá lē´-vī-ă-thăn — handa krókuta høggorm; og hann skal vega drekan sum *er* í sjónum.

2 Á tí degi syngið tit henni, Ein reyðvíns víngarður.

3 Eg, HARRIN, varði hann; eg vil vatna hann hvørja stund: at ikki *nakar* skaði hann, eg vil varða hann nátt og dag.

4 Øði *er* ikki í mær: hvør vildi sett tistlarnar *og* tornir ímóti mær í bardaga? eg vildi farið ígjøgnum teir, eg vildi brent teir tilsaman.

5 Ella lat hann taka hald á míni styrki, *at* hann má fáa í lag frið við meg; *og* hann skal fáa í lag frið við meg.

6 Hann skal elva teimum, sum koma av Jákobi, at sláa rót: Ísrael skal blómka og spíra, og fylla ásjón heimsins við ávøksti.

7 ¶ Hevur hann sligið hann, eins og hann sló teir sum slógu hann? *ella* er hann vigin samsvarandi við slátran teirra sum eru vignir av honum?

8 Í máti, tá ið tað spírar fram, skalt tú kjakast við tað: hann heldur aftur sínum ruskuta vindi á eystanvinds-deginum.

9 Við hesum, tessvegna, skal Jákobs misgerð verða reinskað; og hesin *er* allur ávøksturin til at taka burtur synd hansara; tá ið hann ger allar steinar altarsins sum kálksteinar sum verða slignir sundur, skulu lundirnar og myndirnar ei standa uppi.

10 Tó *skal* hin vardi staður *verða* oyðin, *og* býlið yvirgivið, og eftirlatið sum ein oyða: har skal kálvurin beitast, og har skal hann leggjast niður, og upptæra greinar tess.

11 Tá ið tess bulir eru følnaðir, skulu teir verða brotnir av: kvinnurnar koma, *og* seta eld á teir: tí at tað *er* eitt fólk av ongum skili: tí vil hann, sum gjørdi teir, ikki hava miskunn yvir teir; og hann, sum myndaði teir, vil ongan góðtokka sýna teimum.

12 ¶ Og tað skal bera á í tí degi, *at* HARRIN skal berja av frá sundi áarinnar at streymi Egyptalands, og tit skulu verða savnaðir ein eftir einum, O tit børn Ísraels.

13 Og tað skal bera á í tí degi, *at* hin mikli lúðurin skal verða blástur, og teir skulu koma sum vóru um at farast í Assýriulandi, og hinir útstoyttu í Egyptalandi, og skulu tilbiðja HARRAN á hinum heilaga fjalli í Jerusalem.

KAPITUL 28

VEI til hugmóðar-krúnuna, til drykkjumenn Ē′-phră-ĭm-s, hvørs dýrdsami vakurleiki *er* ein følnandi blóma, sum *eru* á høvdini av hinum feitu dølum teirra sum eru yvirvunnir av víni!

2 Sí, Harrin hevur ein mektigan og sterkan ēin, *sum* eins og ein heglings-ódnarvindur *og* ein oyðandi stormur, eins og ein flóð av mektigum vøtnum — fløðandi yvir, skal kasta niður til jørðina við hondini.

3 Hugmóðar-krúnan, drykkjumenn Ē′-phră-ĭm-s, skulu verða traðkaðir undir føtur:

4 Og hin dýrdsami vakurleiki, sum *er* á høvdini av hinum feita dali, skal verða ein følnandi blóma, *og* eins og hin skundigi ávøkstur áðrenn summarið; sum *tá ið* hann, sum hyggur uppá hann, sær, meðan hann er enn í hond hans, hann etur hann upp.

5 ¶ Á tí degi skal HARRI herliðanna vera til eina dýrdar-krúnu, og til eitt vakurleiks-ennisprýði, at tí eftirverandi av fólki sínum,

6 Og til ein dóms-anda fyri honum sum situr í dómi, og til styrki hjá teimum ið venda orrustuni til portrið.

7 ¶ Men teir eisini eru farnir skeivir gjøgnum vín, og gjøgnum sterkan drykk eru úti av veginum; presturin og propheturin eru farnir skeivir gjøgnum sterkan drykk, teir eru svølgdir upp av víni, teir eru úti av veginum gjøgnum sterkan drykk; teir fara skeivir í sjón, teir snáva *í* dómi.

8 Tí at øll borð eru full av spýggju *og* skitni, *so at har er* einkið plass *reint*.

9 ¶ Hvørjum skal hann frálæra kunnleika? og hvønn skal hann fáa at skilja Guðslæru? *teimum sum eru* vandir av frá mjólkini, *og* drignir frá bróstunum.

10 Tí at forskrift *má vera* omaná forskrift, forskrift omaná forskrift; linja omaná linju, linja omaná linju, her eitt sindur, *og* har eitt sindur:
11 Tí at við stamandi vørrum og eini aðrari tungu vil hann tala til hesa fólks.
12 Til hvørja hann segði, Henda *er* hvíldin, *við hvørji* tit mega elva hinum móðu at hvíla; og henda *er* endurfrískanin: tó vildu teir ikki hoyra.
13 Men HARRANS orð varð teimum forskrift omaná forskrift, forskrift omaná forskrift, linja omaná linju, linja omaná linju; her eitt sindur, *og* har eitt sindur; at teir máttu fara, og falla aftureftir, og verða brotnir, og snerraðir, og tiknir.
14 ¶ Hvørsvegna hoyrið HARRANS orð, tit háðifullu menn, sum stjórna hesum fólkinum sum *er* í Jerusalem.
15 Av tí at tit hava sagt, Vit hava gjørt ein sáttmála við deyða, og við helviti eru vit í semju; tá ið hin yvirfloymandi koyrilin skal fara ígjøgn, skal hann ei koma at okkum: tí at vit hava gjørt lygnir *til* skjól okkara, og undir falsi hava vit fjalt okkum:
16 ¶ Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ, Sí, eg leggi í Zion til ein grundvøll ein stein, ein royndan stein, ein dýrmætan horn*stein*, ein tryggan grundvøll: hann, ið trýr, skal ikki hava skund.
17 Dóm eisini vil eg leggja til *máti*snórin, og rættvísi til loddið: og heglingurin skal sópa burtur skjólið av lygnum, og vøtnini skulu yvirfloyma goymistaðið.
18 ¶ Og tykkara sáttmáli við deyða skal verða ógildaður, og tykkara semja við helviti skal ikki standast; tá ið hin yvirfloymandi koyrilin skal fara ígjøgn, tá skulu tit verða traðkaðir niður av honum.
19 Frá tí tíðini sum hann fer fram, skal hann taka tykkum: tí at morgun eftir morgun skal hann fara yvir, um dag*in* og um nátt*ina:* og hann skal vera ein pláging einans *til at* skilja frágreiðingina.
20 Tí at songin er styttri enn at *ein maður* kann strekkja seg *á henni:* og dekkingin smalri enn at hann kann balla seg *í henni*.
21 Tí at HARRIN skal rísa upp sum *á* Pə-rā'-zĭm fjalli, hann skal vera vreiður sum *í* Gibeons dali, at hann má gera sítt verk, sítt undarliga verk; og fáa sín gerning at bera á, sín undarliga gerning.
22 Nú tessvegna, verið tit ikki spottarar, at ikki tykkara bond verði gjørd sterk: tí at eg havi hoyrt frá Harranum GUÐI herliðanna eina upptæring, enntá avrádd uppá alla jørðina.
23 ¶ Lænið tit oyra, og hoyrið rødd mína; gevið gætur, og hoyrið talu mína.
24 Pløgir plógmaðurin allan dagin til at sáa? opnar hann og lokar bøkkarnar av síni jørð?
25 Tá ið hann hevur gjørt javna ásjónina hará, kastar hann ikki útum karvan, og spjaðir kumman, og kastar inn høvuðs hveitið og hitt tilskilaða byggið og speltið í teirra pláss?
26 Tí at Guð hansara leiðbeinir honum til hygnis, *og* lærir hann.
27 Tí at karvin verður ikki tresktur við einum treski amboði, eiheldur verður eitt kerruhjól malið umkring uppá kumman; men karvin verður sligin út við einum stavi, og kumman við eini stong.
28 Breyð*korn* verður knúst; av tí at hann vil ikki ævir treskja tað, ella bróta *tað við* hjólinum av síni kerru, ella knúsa tað *við* hestmonnum sínum.
29 Hetta eisini kemur fram frá HARRA herliðanna, *sum* er undurfullur í ráði, *og* framúrskarandi í virkan.

KAPITUL 29

VEI til Ár´-ĭ-ĕl-s, til Ár´-ĭ-ĕl-s, staðarins *har* Dávid dvaldist! leggið tit ár afturat ári; latið teir drepa sláturoffur˘.

2 Tó vil eg treingja Ár´-ĭ-ĕl, og har skal vera tyngd og sorg: og tað skal vera mær sum Ár´-ĭ-ĕl.

3 Og eg vil leirast ímóti tær runt umkring, og vil leggja kringseting ímóti tær við einum virkisgarði, og eg vil reisa festningar ímóti tær.

4 Og tú skalt verða førd niður, *og* skalt tala úr jørðini, og tín tala skal vera lág*mælt* úr støvinum, og tín rødd skal vera sum hjá ĕinum sum hevur ein vælkunnugan anda, úr jørðini, og tín tala skal teska úr støvinum.

5 Harafturat skulu fjøldin av tínum fremmandu verða sum smátt støv, og fjøldin av hinum ræðuligu *skulu verða* sum dumba sum svinnur burt: ja, tað skal verða við eitt eygnablunk brádliga.

6 Tú skalt verða heimsøkt av HARRA herliðanna við toru, og við jarðskjálvta, og miklum ljóði, við stormi og ódnarvindi, og flammuni av upptærandi eldi.

7 ¶ Og fjøldin av øllum tjóðunum sum berjast ímóti Ár´-ĭ-ĕl, enntá allir ið berjast ímóti henni og hennara krígsútgerð, og sum treingja hana, skulu vera sum ein dreymur av eini náttarsjón.

8 Tað skal enntá vera sum tá ið ein svangur *maður* droymir, og sí, hann etur; men hann vaknar, og hansara sál er tóm: ella sum tá ið ein tyrstur maður droymir, og sí, hann drekkur; men hann vaknar, og sí, *hann er* ørmaktaður, og hansara sál hevur lyst: soleiðis skal fjøldin av øllum tjóðunum vera, sum berjast ímóti Zion fjalli.

9 ¶ Steðgið tykkum, og undrist; geylið tit út, og geylið: teir eru druknir, men ikki við víni; teir vingla, men ikki við sterkum drykki.

10 Tí at HARRIN hevur helt út omanyvir tykkum andan av djúpum svøvni, og hevur lokað eygu tykkara: prophetarnar og stjórnarar tykkara, síggjararnar hevur hann hult.

11 Og sjónin hjá øllum er vorðin tykkum eins og orðini av eini bók sum er innsiglað, hvørja *menn* flýggja til ĕin sum er lærdur, sigandi, Les hetta, eg biði teg: og hann sigur, Eg fái ikki; tí at hon *er* innsiglað:

12 Og bókin verður flýggjað til hansara sum er ikki lærdur, sigandi, Les hetta, eg biði teg: og hann sigur, Eg eri ikki lærdur.

13 ¶ Hvørsvegna Harrin segði, Við tað at hetta fólk nærkast *mær* við munni sínum, og við varrum sínum æra meg, men hava firrað sítt hjarta fjart frá mær, og teirra ótti mótvegis mær er lærdur við^ forskrift manna:

14 Tessvegna, sí, eg vil halda áfram at gera eitt undrunarvert verk millum hesa fólks, *enntá* eitt undrunarvert verk og eitt undur: tí at vísdómur teirra vísra *manna* skal farast, og skil hinna hygnu *manna* teirra skal verða fjalt.

15 Vei teimum ið søkja djúpt at fjala sítt ráð frá HARRANUM, og teirra verk eru í myrkrinum, og teir siga, Hvør sær okkum? og hvør kennir okkum?

16 Vissuliga, tykkara snúgving av tingum upp *og* niður skal verða mett sum leirið hjá leirkerasmiðinum: tí at skal verkið siga um hann, ið gjørdi tað, Hann gjørdi meg ikki? ella skal tingið, myndað, siga um hann sum myndaði tað, Hann hevði einkið skil?

17 *Er* tað ikki enn eitt sera lítið bil, og Lí´-bă-nŏn skal verða vent yvirí ein fruktagóðan akur, og hin fruktagóði akur skal verða mettur sum ein skógur?

18 ¶ Og á tí degi skulu hinir deyvu hoyra orð bókarinnar, og eyguni hjá teimum blindu skulu síggja út úr dimmleika, og út úr myrkri.

19 Hinir eyðmjúku eisini skulu økja *sína* frøi í HARRANUM, og hinir ørmu millum manna skulu fegnast í Hinum Heilaga Ísraels.

20 Tí at hin ræðuligi er førdur til einkiðs, og spottarin er upptærdur; og allir, sum vakta eftir misgerð, eru skornir av:

21 Sum gera ein mann *til* ein misbrótara fyri eitt orð, og leggja eina snerru til hansara sum formanar í portrinum; og venda til viks hin rættláta fyri eitt ting av ongum *virði*.

22 Tessvegna, svá sigur HARRIN, sum endurloysti Ábraham, viðvíkjandi húsi Jákobs, Jákob skal ikki nú skammast, eiheldur skal andlit hansara nú gerast følið.

23 Men tá ið hann sær børn síni, verkið av hondum mínum, í miðjum sær, skulu teir halga navn mítt, og halga Hin Heilaga Jákobs, og skulu óttast Guð Ísraels.

24 Teir eisini, sum fóru skeivir í anda, skulu koma til skil; og teir, sum meylaðu, skulu læra Guðslæru.

KAPITUL 30

VEI til hinna uppreistrarsomu barna, sigur HARRIN, sum leggja ráð, men ikki av mær; og sum dekka við eini dekking, men ikki av anda mínum, at teir mega leggja synd afturat synd:

2 Sum ganga *fyri* at fara niður í Egyptaland, og hava ikki spurt hjá munni mínum; *fyri* at styrkja seg sjálvar í styrki Pharaohs, og *fyri* at troysta á skugga Egyptalands!

3 Tí skal styrki Pharaohs verða skomm tykkara, og álitið á skugga Egyptalands ørkymlan *tykkara*.

4 Tí at hansara prinsar vóru í Zōʹăn, og hans umboðsmenn komu til Háʹnēs.

5 Teir skammaðust allir um eitt fólk *sum* kundi ikki gagna teimum, ella vera ein hjálp, ella gagn, men ein skomm, og eisini ein last.

6 Byrði sunnan-djóranna: inn í landið av trongd og angist, hvaðan frá *koma* hin unga og gamla leyva, eiturormurin og *hin* eldsligi fljúgvandi dreki, teir vilja bera sínar ríkdómar uppiá herðunum á ungum asnum, og sínar skattir uppiá kúlunum á kamelum, til eitt fólk *sum* skal ikki gagna *teimum*.

7 Tí at Egyptarnir skulu hjálpa til fánýtis, og til einkið endamál: tí havi eg rópt viðvíkjandi hesum, Teirra styrki *er* at sita stillir.

8 ¶ Far nú, skriva tað frammi fyri teimum á eina talvu, og viðmerk tað í eina bók, at tað má vera til tíðina sum koma skal, um ævir og ævir:

9 At hetta *er* eitt uppreistrarsamt fólk, lúgvandi børn, børn *sum* ei vilja hoyra lóg HARRANS:

10 Sum siga til síggjaranna, Síggið ikki; og til prophetanna, Propheterið ikki at okkum rætt ting, talið innat okkum mjúk ting, propheterið falsk*leik*ar:

11 Farið tykkum út av veginum, vendið til viks út av rásini, elvið Hinum Heilaga Ísraels at halda uppat frammi fyri okkum ífrá.

12 Hvørsvegna svá sigur Hin Heilagi Ísraels, Av tí at tit vanvirða hetta orðið, og troysta á kúgan og spiltsemi, og stuðlast hará:

13 Tí skal henda misgerðin vera hjá tykkum sum ein brestur tilreiðar at detta, bólgnandi út á einum høgum múri, hvørs bróting kemur dáttliga í einum eygnablunki.

14 Og hann skal bróta hann

sum brótingin av keri leirkerasmiðarins, sum verður brotið í stykkir; hann skal ikki eira: so at tað skal ikki finnast í brestingini av honum eitt leirbrot til at taka eld frá grúgvuni, ella til at taka vatn *við* úr holuni.

15 Tí at svá sigur Harrin GUÐ, Hin Heilagi Ísraels; Í afturkoming og hvílu skulu tit vera frelstir; í kvirru og í áliti skal vera styrki tykkara: og tit vildu ikki.

16 Men tit søgdu, Nei; tí at vit vilja flýggja uppiá hestum; tí skulu tit flýggja: og, Vit vilja ríða uppiá teimum fljótu; tí skulu teir, sum elta tykkum, vera fljótir.

17 Eitt túsund *skulu flýggja* við hartingina av einum; við hartingina av fimm skulu tit flýggja: til tit verði eftirlatnir sum ein vitastong uppiá toppinum av einum fjalli, og sum eitt hermerki á einum heyggi.

18 ¶ Og tí vil HARRIN bíða, at hann má vera náðisamur at tykkum, og tí vil hann vera upphevjaður, at hann má hava miskunn yvir tykkum: tí at HARRIN *er* ein dóms Guð: vælsignaðir *eru* allir teir sum bíða eftir honum.

19 Tí at fólkið skal búgva í Zion í Jerusalem: tú skalt gráta ei meira: hann vil vera sera náðisamur at tær við røddina á tínum rópi; tá ið hann skal hoyra tað, hann vil svara tær.

20 Og *hóast* Harrin gevi tykkum mótburðar-breyðið, og nívdarvatnið, tó skulu ikki tínir frálærarar verða firraðir í eitt horn meira, men tíni eygu skulu sjá tínar frálærarar:

21 Og tíni oyru skulu hoyra eitt orð aftanfyri teg, sigandi, Hesin *er* vegurin, gangið tit í honum, tá ið tit venda til hinnar høgru handar, og tá ið tit venda til hinnar vinstru.

22 Tit skulu dálka eisini dekkingina av tínum ristu myndum av silvuri, og skreytið av tínum bræddu myndum av gulli: tú skalt kasta tær burt sum eitt mánasjúkusamt klæði; tú skalt siga við tað, Slepp tær hiðani.

23 Tá skal hann geva regn sáðs tíns, sum tú skalt sáa lendið við; og breyð grøðis jarðarinnar, og tað skal vera feitt og ríkiligsamt: á tí degi skal tín fenaður beitast á stórum beitum.

24 Oksarnir somuleiðis og teir ungu asnarnir, sum velta lendið, skulu eta reint fóður, sum hevur verðið sáldað við skuvluni og við varpkvíslini.

25 Og tað skulu vera uppiá hvørjum høgum fjalli, og uppiá hvørjum høgum heyggi, áir *og* streymar av vøtnum á degi hins mikla sláturs, tá ið tornini falla.

26 Harafturat skal ljósið av mánanum vera sum ljósið av sólini, og ljósið av sólini skal vera sjeyfalt, sum ljósið av sjey døgum, í tí degi ið HARRIN bindur um brestin hjá fólki sínum, og grøðir smekkin av sári teirra.

27 ¶ Sí, navn HARRANS kemur fjar*vegis* frá, brennandi *við* firtni hans, og *tess* byrði *er* tung: hans varrar eru fullar av harmavreiði, og hansara tunga sum ein upptærandi eldur:

28 Og hans andadráttur, sum ein yvirfloymandi streymur, skal røkka til miðjan hálsin, til at sálda tjóðirnar við fáfongdar-sáldini: og *har skal vera* eitt boygsl í kjálkunum á fólkinum, voldandi *teimum* at fara skeivum.

29 Tit skulu hava ein sang, eins og um náttina, *tá ið* ein heilagur hátíðarligleiki verður hildin; og hjartagleði, sum tá ið ēin fer við eini floytu til *tess* at koma á fjall HARRANS, til Hins mektiga Ísraels.

30 Og HARRIN skal volda síni dýrdsomu rødd at verða hoyrdari, og skal sýna lættingina niður av

sínum armi, við harmavreiðini av *síni* firtni, og *við* flammuni av einum upptærandi eldi, *við* spjaðing, og ódnarvindi, og heglum.

31 Tí at gjøgnum rødd HARRANS skal Assýriarin verða bardur niður, *sum* slerdi við einum sprota.

32 Og *á* hvørjum plássi, har hin grundfesti stavurin skal fara yvir, sum HARRIN skal leggja uppá hann, skal *tað* vera við tamburínum og hørpum: og í skakanarbardøgum vil hann berjast við hann.

33 Tí at Tǒ-phět *er* fyriskipað frá gomlum *av;* ja, til kongin er tað fyribúgvið; hann hevur gjørt *tað* djúpt *og* stórt: stápilin av tí *er* eldur og nógvur viður; HARRANS andadráttur, sum ein streymur av svávuli, kyndir tað.

KAPITUL 31

VEI til teirra sum fara niður til Egyptalands eftir hjálp; og styðjast á hestar, og troysta á vagnar, av tí at *teir eru* mangir; og á hestmenn, av tí at teir eru sera sterkir; men teir líta ikki at Hinum Heilaga Ísraels, eiheldur søkja HARRAN!

2 Tó *er* hann eisini vísur, og vil koma við illum, og vil ikki kalla tilbakar síni orð: men vil reisast ímóti húsinum hjá illgerarunum, og ímóti hjálpini hjá teimum ið virka misgerð.

3 Nú, Egyptarnir *eru* menn, og ikki Guð; og teirra hestar kjøt, og ikki andi. Tá ið HARRIN skal strekkja út sína hond, skal bæði hann, ið hjálpir, falla; og hann, ið er holpin, skal falla niður; og teir allir skulu bila tilsaman.

4 Tí at svá hevur HARRIN talað við meg, Líka sum leyvan og hin unga leyva, ýlandi á síni bráð, tá ið ein fjøld av hirðum verður kallað út ímóti henni, vil *hon* ei verða rædd fyri teirra rødd, ella lækka seg sjálva fyri ljóðið av teimum: soleiðis skal HARRI herliðanna koma oman at berjast fyri Zion fjall, og fyri heyg tess.

5 Eins og fuglar flúgvandi, soleiðis vil HARRI herliðanna verja Jerusalem; verjandi eisini vil hann útfría *tað; og* farandi yvir vil hann varðveita *tað*.

6 ¶ Vendið tit at *honum, frá* hvørjum Ísraels børn hava djúpliga gjørt uppreist.

7 Tí at á tí degi skal hvør maður kasta burt sínar avgudar av silvuri, og sínar avgudar av gulli, sum tykkara egnu hendur hava gjørt tykkum *til* eina synd.

8 ¶ Tá skal Assýriarin falla við svørðinum, ikki av einum mektigum manni; og svørðið, ei hjá einum meinigum manni, skal uppslúka hann: men hann skal flýggja frá svørðinum, og hans ungu menn skulu verða uppskakaðir.

9 Og hann skal fara yvir til sín festning vegna ótta, og hansara prinsar skulu vera ræddir fyri hermerkinum, sigur HARRIN, hvørs eldur *er* í Zion, og hans bræðsluovnur í Jerusalem.

KAPITUL 32

SÍ, ein kongur skal ríkja í rættvísi, og prinsar skulu stjórna í dómi.

2 Og ein maður skal vera sum eitt goymistað frá vindinum, og ein lívd frá ódnarvindinum; sum áir av vatni í einum turrum plássi, sum skuggin av einum miklum kletti í einum ørmaktaðum landi.

3 Og eyguni hjá teimum, sum síggja, skulu ei vera kám; og oyruni hjá teimum, sum hoyra, skulu lýða á.

4 Hjartað eisini hjá teimum bráðu skal skilja kunnleika, og tungan hjá stamarunum skal vera tilreiðar at tala týðiliga.

5 Hin ringi persónurin skal ei meira verða kallaður frælsligur, ella óvættið sagt *vera* stórtøkið.

6 Tí at hin ringi persónurin vil tala skemdarverk, og hansara hjarta vil virka misgerð, at útinna hykl, og at mæla villfaring ímóti HARRANUM, at gera tóma sálina hjá tí svanga, og hann vil elva drykkinum hjá tí tyrsta at svitast.

7 Amboðini eisini hjá óvættinum *eru* ónd: hann upphugsar vond uppáfund *fyri* at oyðileggja hinar ørmu við lúgvandi orðum, sjálvt tá ið hin tørvandi talar rætt.

8 Men hin frælsligi upphugsar frælsligar lutir; og við frælsligum lutum skal hann standast.

9 ¶ Rísið upp, tit kvinnur, sum eru við ró; hoyrið rødd mína, tit sútleysu døtur; lænið oyra at talu míni.

10 Mangar dagar og ár˘ skulu tit verða órógvaðar, tit sútleysu kvinnur: tí at vínskurðurin skal svitast, savningin skal ikki koma.

11 Nøtrið, tit kvinnur, sum eru við ró; verðið órógvaðar, tit hinar sútleysu: skræðið av tykkum, og gerið tykkum berar, og gyrðið *sekkjaklæði* uppá *tykkara* lendar.

12 Tær skulu harma um vørturnar, um hinar dámligu akrarnar, um hitt fruktagóða vintræið.

13 Uppá landið hjá mínum fólki skulu koma upp tornir *og* tistlar; ja, uppá øll frøis-húsini *í* hinum frødliga staði:

14 Av tí at slottini skulu verða yvirgivin; fjøldin av staðinum skal verða eftirlatin; festningarnir og tornini skulu verða til hellir um ævir, ein frøi hjá villasnum, eitt beiti hjá smáfæafylgjum;

15 Inntil andin verði heltur uppá okkum frá tí høga, og oyðan verði ein fruktagóður akur, og hin fruktagóði akur verði roknaður fyri ein skóg.

16 Tá skal dómur búgva í oyðuni, og rættvísi verða verandi í hinum fruktagóða akri.

17 Og verkið av rættvísi skal vera friður; og virknin av rættvísi kvirra og vissa um ævir.

18 Og fólk mítt skal búgva í einum friðsamligum býli, og í tryggum bústøðum, og í róligum hvíluplássum;

19 Tá ið tað skal hegla, komandi niður á skógin; og staðurin skal vera lágur í einum lágum plássi.

20 Vælsignaðir *eru* tit sum sáa framvið øllum vøtnum, sum senda fram *hagar* føtur oksans og asnans.

KAPITUL 33

VEI til tín sum rænirt, og tú *varðst* ikki rændur; og bert *teg* sviksamliga at, og teir bóru *seg* ikki sviksamliga at móti tær! tá ið tú skalt halda uppat at ræna, skalt tú verða rændur; *og* tá ið tú skalt gera lok á at bera *teg* sviksamliga at, skulu teir bera *seg* sviksamliga at móti tær.

2 O HARRI, ver náðisamur at okkum; vit hava væntað eftir tær: vert tú teirra armur hvønn morgun, okkara frelsa eisini í tíðini av trongd.

3 Við ljóðið av ófriðarlætinum flýddi fólkið; við lyftingina upp av tær sjálvum vórðu tjóðirnar spjaddar.

4 Og tykkara herfongur skal verða savnaður *sum* savningin hjá kálorminum: sum renningin til og frá av grashoppum skal hann renna omanyvir teir.

5 HARRIN er upphevjaður; tí at hann býr á hædd*ini:* hann hevur fylt Zion við dómi og rættvísi.

6 Og vísdómur og kunnleiki skulu vera støðugleikin av tínum tíðum, *og* styrki av frelsu: ótti HARRANS *er* hansara dýrgripur.

7 Sí, hinir reystu teirra skulu rópa fyri uttan: friðarins umboðsmenn skulu gráta beiskliga.

8 Alfaravegirnir liggja oydnir,

hin vegfarandi maður heldur upp-
at: hann hevur brotið sáttmál-
an, hann hevur vanvirt staðirnar,
hann gevur gætur eftir ongum
manni.
9 Jørðin harmast *og* fánar: Lí-
bă-nŏn skammast *og er* høgt nið-
ur: Sjâr´-ŏn er eins og ein oyða;
og Bá´-sjän og Carmel rista av
sínar ávøkstir.
10 Nú vil eg rísa, sigur HARRIN;
nú vil eg verða upphevjaður; nú
vil eg lyfta upp meg sjálvan.
11 Tit skulu ala fram dumbu,
tit skulu bera fram hálm: tykkara
andadráttur, *sum* eldur, skal upp-
tæra tykkum.
12 Og fólkið skal vera *sum*
brennurnar av kálki: *sum* tornir,
skornir upp, skulu teir verða
brendir í eldinum.
13 ¶ Hoyrið tit, *sum eru* langt
burturi, hvat eg havi gjørt; og tit,
ið eru nær, viðurkennið mátt mín.
14 Syndararnir í Zion eru
ræddir; óttafullsemi hevur tikið
hyklararnar á bóli. Hvør okkara
millum skal búgva hjá tí upptær-
andi eldinum? hvør okkara mill-
um skal búgva hjá ævigtvarandi
brenningum?
15 Hann sum gongur rættvísi-
liga, og talar reiðiliga; hann sum
vanvirðir vinningin av kúganum,
sum ristir sínar hendur frá at
halda á mutrum, sum typpir síni
oyru frá at hoyra um blóð, og lok-
ar síni eygu frá at síggja ilt;
16 Hann skal búgva á hædd-
ini: hansara verndarpláss *skal*
vera krígsútgerðirnar av klettum:
breyð skal verða givið honum;
hansara vøtn *skulu vera* trygg.
17 Tíni eygu skulu síggja kong-
in í hansara vakurleika: tey skulu
skoða landið sum er sera langt
burturi.
18 Títt hjarta skal íhuga ræð-
slu. Hvar *er* hin skriftlærdi? hvar
er móttakarin? hvar *er* hann sum
taldi tornini?
19 Tú skalt ikki síggja eitt øgi-
ligt fólk, eitt fólk av eini djypri
talu enn tú kanst fata; av eini
stamandi tungu, *at tú* ei *kanst*
skilja.
20 Hygg uppá Zion, staðin av
hátíðarsemum várum: tíni eygu
skulu sjá Jerusalem — ein kvirran
bústað, eitt tabernakkul *sum* skal
ikki verða tikið niður; ikki ein av
tess hælum skal nakrantíð verða
firraður, eiheldur skulu nøkur av
tess bondum verða slitin.
21 Men har *vil* hin dýrdsami
HARRI *vera* okkum eitt pláss av
breiðum áum *og* streymum; hvarí
eingin galeiða við árum skal fara,
eiheldur skal stásiligt skip fara
har framvið.
22 Tí at HARRIN *er* okkara dóm-
ari, HARRIN *er* okkara lóggevari,
HARRIN *er* okkara kongur; hann
vil frelsa okkum.
23 Tíni togverk eru loyst; tey
kundu ikki væl styrkja sín mast-
ur, tey kundu ikki breiða seglið:
tá verður herfongurin av einum
miklum ráni skiftur; teir lamnu
taka fongin.
24 Og íbúgvin skal ikki siga,
Eg eri sjúkur: fólkið, sum býr
harí, *skal vera* fyrigivið *sína* mis-
gerð.

KAPITUL 34

KOMIÐ nær, tit tjóðir, at
hoyra; og lýðið á, tit fólk:
lat jørðina hoyra, og alt sum harí
er; verøldina, og øll ting sum
koma fram úr henni.
2 Tí at harmavreiði HARRANS
er uppiá øllum tjóðum, og *hans*
ovursinni uppiá øllum teirra her-
um: hann hevur aldeilis oytt teir,
hann hevur givið teir yvir til slátr-
ingina.
3 Teirra vignu eisini skulu verða
kastaðir út, og teirra stinkur skal
koma upp úr teirra líkum, og
fjøllini skulu verða bráðnað við
teirra blóði.

4 Og alt herlið himins skal verða upployst, og himnarnir skulu verða rullaðir saman sum ein bókarrulla: og alt herliðið av teimum skal falla niður, eins og blaðið fellur av frá víntræinum, og eins og ein fallandi *fika* frá fikutræinum.

5 Tí at svørð mítt skal verða baðað í himni: sí, tað skal koma omanyvir Î-dû-mē´-ū, og omanyvir fólk bølbønar mínar, til dóms.

6 Svørð HARRANS er fylt við blóði, tað er gjørt feitt við fiti, *og* við blóðinum av lombum og geitum, við feittinum av veðranýrum: tí at HARRIN hevur eitt sláturoffur í Bŏz´-răh, og eitt mikið slátur í landi Î-dû-mē´-ū.

7 Og ēinhyrningarnir skulu koma oman við teimum, og ungtarvarnir við tarvunum; og teirra land skal verða bloytt við blóði, og teirra støv gjørt feitt við fiti.

8 Tí at *tað er* dagurin av hevnd HARRANS, *og* árið av endurgjøldum fyri deilumál Zions.

9 Og tess streymar skulu verða skiftir í bik, og tess støv í brennistein, og tess land skal gerast brennandi bik.

10 Tað skal ikki verða sløkt nátt ella dag; roykurin harav skal fara upp um ævir: frá ætt til ætt skal tað liggja oyði; eingin skal fara ígjøgnum tað um ævir og ævir.

11 ¶ Men hiplingurin og hegrin skulu ognast tað; uglan eisini og ravnurin skulu búgva í tí: og hann skal tenja út omanyvir tað ørkymlanar-*máti*snórin, og steinar tómleikans.

12 Teir skulu kalla tess tignarligu til kongadømisins, men eingin *skal vera* har, og allir hennara prinsar skulu vera einkið.

13 Og tornir skulu koma upp í slottum hennara, notur og tornarunnar í festningum tess: og tað skal vera ein bústaður hjá drekum, *og* ein forgarður fyri uglur.

14 Hini villini djór úr oyðuni skulu eisini møtast við hinum villini djórum úr oynni, og skrímslið skal geyla til felaga síns; og tornuglan eisini skal hvíla har, og finna til sín sjálvs eitt hvíldarstað.

15 Har skal hin mikla ugla gera sítt reiður, og leggja, og klekja, og savna undir skugga sín: har skulu gammarnir eisini verða savnaðir, hvør *og* ēin við maka sínum.

16 ¶ Søkið tit úr bók HARRANS, og lesið: eingin av hesum skal tróta, eingin skal vanta sín maka: tí at muður mín, hann hevur áboðið; og hans andi, hann hevur savnað teir.

17 Og hann hevur kastað lutin fyri teir, og hans hond hevur skift teimum tað eftir *máti*snóri: teir skulu *hava* tað í ogn um ævir, frá ætt til ætt skulu teir búgva harí.

KAPITUL 35

OYÐAN og hitt avsíðisliga pláss skulu vera glað fyri teir; og oyðimørkin skal fegnast, og blómka sum rósan.

2 Tað skal blómka ríkiliga, og fegnast enntá við frøi og synging: Lī´-bă-nŏn-s dýrd skal verða givin tí, avbærni Carmels og Sjâr´-ŏn-s, tey skulu síggja dýrd HARRANS, *og* avbærni Guðs várs.

3 ¶ Styrkið tit hinar veiku hendur, og gerið føst hini máttleysu knø.

4 Sigið við teir *sum eru* av einum óttafullum hjarta, Verið sterkir, óttist ikki: sí, tykkara Guð vil koma *við* hevnd, *enntá* Guð *við* einum endurgjaldi; hann vil koma og frelsa tykkum.

5 Tá skulu eygu hinna blindu verða opnað, og oyru hinna deyvu skulu verða frálokað.

6 Tá skal hin lamni *maðurin* leypa sum ein hjørtur, og tunga hins málleysa syngja: tí at í oyðuni

skulu vøtn bróta út, og streymar í oyðimørkini.

7 Og hitt svidna lendi skal gerast ein hylur, og hitt tyrsta land vatnslindir: í bústøðunum hjá drekum, har hvør lá, *skal vera* gras við rørum og sevum.

8 Og ein alfaravegur skal vera har, og ein vegur, og hann skal verða kallaður Vegur heilagleikans; hin óreini skal ikki fara yvir hann; men hann *skal vera* til hasar: hinir vegfarandi menn, hóast dárar, skulu ei fara skeivir *harí*.

9 Eingin leyva skal vera har, ella *nakað* ránsamt djór skal fara niðan hará, tað skal ikki finnast har; men hinir endurloystu skulu ganga *har:*

10 Og hinir loysigoldnu HARRANS skulu venda aftur, og koma til Zion við sangum og ævigtvarandi frøi uppiá høvdum sínum: teim skal lutast frøi og gleði, og sorg og suffan skulu flýggja burt.

KAPITUL 36

NÚ, tað bar á í hinum fjúrtanda ári Hëz-ë-kí´-ăh kongs, *at* Sën-năch´-ër-ĭb kongur av Assýriu kom niðan ímóti øllum teimum vardu staðunum av Judah, og tók teir.

2 Og kongurin av Assýriu sendi Răb´-sjă-kēh frá Lá´-chĭsj til Jerusalem at kong Hëz-ë-kí´-ăh við einum miklum heri. Og hann stóð við vatnleiðing hins ovara hyls á alfaraveginum av *klædna*reinsarans akri.

3 Tá komu fram at honum Ē´-lĭ-ă-kĭm, sonur Hĭl´-kī-ăh, sum var yvir húsinum, og Sjëb´-nă hin skriftlærdi, og Jó´-âh, sonur Á´-săph-s, skrásetarin.

4 ¶ Og Răb´-sjă-kēh segði við teir, Sigið tit nú til Hëz-ë-kí´-ăh, Svá sigur hin mikli kongur, kongurin av Assýriu, Hvat álit *er* hetta, hvará tú líturt?

5 Eg sigi, *sigurt tú,* (men *tey eru bert* fáfongd orð), *Eg havi* ráð*legging* og styrki til kríggj: nú, á hvønn líturt tú, at tú gert uppreist ímóti mær?

6 Sí, tú líturt á stav hesa brotna sevleggs, á Egyptaland; á hvønn, um ein maður leni, vil hann fara inn í hond hans, og gata hana: soleiðis *er* Pharaoh kongur av Egyptalandi fyri øllum sum líta á hann.

7 Men um tú sigi til mín, Vit líta á HARRAN Guð váran: *er tað* ikki hann, hvørs høgu støð og hvørs altør Hëz-ë-kí´-ăh hevur tikið burt, og sagt til Judah og til Jerusalem, Tit skulu tilbiðja frammanfyri hesum altarinum?

8 Nú tessvegna, gev pønt, eg biði teg, til meistara míns, kongsins av Assýriu, og eg vil geva tær tvey túsund hestar, um tú veri *teg* førur fyri, fyri tín part, at seta reiðmenn uppá teir.

9 Hvussu vilt tú tá venda burt andlitið á ēinum høvuðsmanni av hinum minstu av tænarum meistara míns, og seta títt álit á Egyptaland um vagnar og um hestmenn?

10 Og eri eg nú komin niðan uttan HARRAN ímóti hesum landi at oyða tað? HARRIN segði við meg, Far niðan ímóti hesum landi, og oyð tað.

11 ¶ Tá søgdu Ē´-lĭ-ă-kĭm og Sjëb´-nă og Jó´-âh við Răb´-sjă-kēh, Tala, eg biði teg, við tænarar tínar á hinum Sýriska máli; tí at vit skilja *tað:* og tala ikki til okkara á Jødanna máli, í oyruni á fólkinum sum *eru* á múrinum.

12 ¶ Men Răb´-sjă-kēh segði, Hevur meistari mín sent meg til meistara tín og til tín at tala hesi orð? *hevur hann* ikki *sent meg* til menninar, sum sita uppiá múrinum, at teir mega eta sítt egna skarn, og drekka sítt egna piss við tykkum?

13 Tá stóð Răb´-sjă-kēh, og róp-

ti við eini harðari rødd á Jødanna máli, og segði, Hoyrið tit orðini hjá hinum mikla kongi, konginum av Assýriu.

14 Svá sigur kongur, Latið ikki Hëz-ĕ-kī´-ăh villleiða tykkum: tí at hann skal ikki verða førur fyri at bjarga tykkum.

15 Eiheldur latið Hëz-ĕ-kī´-ăh fáa tykkum *at* líta á HARRAN, sigandi, HARRIN vil vissuliga bjarga okkum: hesin staður skal ei verða flýggjaður inn í hondina á konginum av Assýriu.

16 Lurtið ikki eftir Hëz-ĕ-kī´-ăh: tí at svá sigur kongurin av Assýriu, Gerið *eina semju* við meg *við* ˆ eini gávu, og komið út til mín: og etið tit hvør *og* ēin av víntræi sínum, og hvør *og* ēin av fikutræi sínum, og drekkið tit hvør *og* ēin vøtnini úr síni egnu veit;

17 Inntil eg komi og taki tykkum burt til eitt land, líka *sum* tykkara egna land, eitt land av korni og víni, eitt land av breyði og víngørðum.

18 *Verið varnir,* at ikki Hëz-ĕ-kī´-ăh yvirtali tykkum, sigandi, HARRIN vil bjarga okkum. Hevur nakar av gudum tjóðanna bjargað sínum landi út úr hond kongsins av Assýriu?

19 Hvar *eru* gudar Há´-măth-s og Âr´-phăd-s? hvar *eru* gudar Sē-phâr´-vâ-īm-s? og hava teir bjargað Să-mâr´-ī-ŭ út úr hond míni?

20 Hvørjir *eru teir* millum alra gudanna hjá hesum londunum, sum hava bjargað sínum landi út úr hond míni, at HARRIN skuldi bjargað Jerusalem út úr hond míni?

21 Men teir hildu friði sínum, og svaraðu honum ikki eitt orð: tí at áboðið hjá kongi var, sigandi, Svarið honum ikki.

22 ¶ Tá komu Ē´-lī-ă-kīm, sonur Hĭl´-kī-ăh, sum *var* yvir húshaldinum, og Sjĕb´-nă hin skriftlærdi, og Jó´-âh, sonur Á´-săph-s, skrásetarin, til Hëz-ĕ-kī´-ăh við klæðum *sínum* skrøddum, og søgdu honum orðini hjá Răb´-sjă-kēh.

KAPITUL 37

OG tað bar á, tá ið Hëz-ĕ-kī´-ăh kongur hoyrdi *tað,* at hann skræddi klæðir síni, og dekkaði seg við sekkjaklæði, og fór inn í hús HARRANS.

2 Og hann sendi Ē´-lī-ă-kīm, sum *var* yvir húshaldinum, og Sjĕb´-nă hin skriftlærda, og hinar elstu av prestunum, dekkaðar við sekkjaklæði, at Esaiah prophēti Amoz syni.

3 Og teir søgdu við hann, Svá sigur Hëz-ĕ-kī´-ăh, Hesin dagur *er* ein dagur av trongd, og av hartan, og av Guðsspottan: tí at børnini eru komin til føðingina, og *til er* ikki styrki til at bera fram.

4 Tað kann vera, *at* HARRIN tín Guð vilji hoyra orðini hjá Răb´-sjă-kēh, hvønn kongurin av Assýriu, hansara meistari, hevur sent at spotta hin livandi Guð, og vil átala orðini sum HARRIN tín Guð hevur hoyrt: hvørsvegna lyft upp *tína* bøn fyri leivdini sum eftir er.

5 So tænararnir hjá Hëz-ĕ-kī´-ăh komu til Esaiah.

6 ¶ Og Esaiah segði við teir, Svá skulu tit siga við meistara tykkara, Svá sigur HARRIN, Ver ikki ræddur fyri orðunum sum tú hevurt hoyrt, við hvørjum tænararnir hjá konginum av Assýriu hava Guðsspottað meg.

7 Sí, eg vil senda ein blástur omanyvir hann, og hann skal hoyra eitt graml, og venda aftur til egna land sítt; og eg vil volda honum at falla við ˆ svørðinum í egna landi sínum.

8 ¶ So Răb´-sjă-kēh vendi aftur, og fann kongin av Assýriu kríggjandi ímóti Lĭb´-năh: tí at hann hevði hoyrt, at hann var farin avstað frá Lá´-chĭsj.

9 Og hann hoyrdi sagt viðvíkjandi Tïr-há´-käh kongi av Ê-thï-ō´-pï-ŭ, Hann er komin fram at føra kríggj við teg. Og tá ið hann hoyrdi *tað*, sendi hann sendiboðar til Hëz-ë-kī´-äh,

10 Svá skulu tit tala til Hëz-ë-kī´-äh kongs av Judah, sigandi, Lat ikki Guð tín, á hvønn tú líturt, villleiða teg, sigandi, Jerusalem skal ikki verða givið inn í hondina á konginum av Assýriu.

11 Sí, tú hevurt hoyrt hvat kongarnir av Assýriu hava gjørt við øll lond, við at oyða tey fullkomiliga; og skalt tú verða bjargaður?

12 Hava gudarnir hjá tjóðunum bjargað teimum sum mínir fedrar hava oytt, *eins og* Gō´-zän, og Hár´-än, og Rĕ´-zĕph, og børn Edens sum *vóru* í Tê-läs´-sâr?

13 Hvar *er* kongurin av Há´-măth, og kongurin av Âr´-phăd, og kongurin av Sê-phâr´-vâ-ïm-staði, Hĕ´-nä, og Ï´-väh?

14 ¶ Og Hëz-ë-kī´-äh móttók brævið frá hendi sendiboðanna, og las tað: og Hëz-ë-kī´-äh fór niðan at húsi HARRANS, og breiddi tað framfyri HARRAN.

15 Og Hëz-ë-kī´-äh bað at HARRANUM, sigandi,

16 O HARRI herliðanna, Guð Ísraels, sum býrt *ímillum* chêr-û-bïm´-arnar, tú *ert* Guð˜, *enntá* tú aleinaur, alra kongadøma jarðarinnar: tú hevurt gjørt himin og jørð.

17 Boygg oyra títt, O HARRI, og hoyr; opna eygu tíni, O HARRI, og síggj: og hoyr øll orðini hjá Sën-näch´-ër-ïb-i, sum hevur sent at spotta hin livandi Guð.

18 Av sonnum, HARRI, hava kongarnir av Assýriu lagt *í* oyði allar tjóðirnar, og teirra lond,

19 Og hava kastað teirra gudar inn í eldin: tí at teir *vóru* eingir gudar, men verkið av manna hondum, viður og steinur: tí hava teir oyðilagt teir.

20 Nú tessvegna, O HARRI Guð vár, frels okkum frá hond hans, at øll kongadømir jarðarinnar mega vita, at tú *ert* HARRIN, *enntá* tú einans.

21 ¶ Tá sendi Esaiah Amoz sonur at Hëz-ë-kī´-äh, sigandi, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Við tað *at* tú hevurt biðið til mín ímóti Sën-näch´-ër-ïb kongi av Assýriu:

22 Hetta *er* orðið sum HARRIN hevur talað viðvíkjandi honum; Jomfrúgvin, Zions dóttir, hevur vanvirt teg, *og* læið teg í háð; Jerusalems dóttir hevur rist sítt høvur at tær.

23 Hvønn hevurt tú lastað og Guðsspottað? og ímóti hvørjum hevurt tú hevjað *tína* rødd, og lyft upp tínum eygum til hæddar? *enntá* ímóti Hinum Heilaga Ísraels.

24 Við˄ tínum tænarum hevurt tú spottað Harran, og hevurt sagt, Við˄ fjøldini av mínum vagnum eri eg komin niðan til hædd fjallanna, til síður Lí´-bä-nŏn-s; og eg vil skera niður hini høgu sedris*trø* tess, *og* hini úrvals furutrø tess: og eg vil innfara inn í hæddina av landamarki hans, *og* skógin av Carmel hans.

25 Eg havi grivið, og drukkið vatn; og við ilini á mínum fóti havi eg turkað upp allar áirnar av teimum kringsettu plássunum.

26 Hevurt tú ikki hoyrt langt síðan, *hvussu* eg havi gjørt tað; *og* úr fyrndar tíðum, at eg havi myndað tað? nú havi eg fingið tað at bera á, at tú skuldirt verða til *tess* at leggja *í* oyði vardar staðir *til* oyðusamar dungar.

27 Tí *vórðu* teirra íbúgvar av lítlari kraft, teir vórðu mótfalnir og ovfarnir: teir vórðu *sum* gras akursins, og *sum* hin grøna urt, *sum* grasið á húsatoppunum, og *sum korn* — svidnað áður enn tað verði vaksið upp.

28 Men eg kenni títt býli, og tína útfaring, og tína innkoming, og tína øði ímóti mær.
29 Av tí at tín øði ímóti mær, og tín hávi, er komin upp inní míni oyru, tí vil eg seta mín húk í tína nøs, og mítt boygsl í varrar tínar, og eg vil venda tær tilbakar eftir tí vegi, eftir hvørjum tú komst.
30 Og hetta *skal vera* tær tekin, Tit skulu eta *hetta* árið slíkt sum veksur av sær sjálvum; og annað árið tað sum sprettur av hinum sama: og í tí triðja árinum sáa tit, og heysta, og planta víngarðar, og eta ávøkstin av tí.
31 Og leivdin, sum er komin undan av húsi Judah, skal aftur sláa rót niðureftir, og bera ávøkst uppeftir:
32 Tí at út úr Jerusalem skal ganga fram ein leivd; og teir, sum komast undan út úr Zion fjalli: vandlæti HARRA herliðanna skal gera hetta.
33 Tessvegna, svá sigur HARRIN viðvíkjandi konginum av Assýriu, Hann skal ikki koma inn í henda stað, ella skjóta eina ørv har, ella koma framfyri hann við skjøldrum, ella laða ein *virkis*garð ímóti honum.
34 Eftir tí vegi sum hann kom, eftir hinum sama skal hann venda aftur, og skal ikki koma inn í henda stað, sigur HARRIN.
35 Tí at eg vil verja henda stað *fyri* at frelsa hann fyri mína egnu skuld, og fyri tænara míns Dávids skuld.
36 Tá fór eingil HARRANS fram, og sló í leirinum hjá Assýriarunum eitt hundrað og fýrsinstjúgu og fimm túsund: og tá ið teir reistust tíðliga um morgunin, sí, teir *vóru* allir deyð lík.
37 ¶ So Sën-năch´-ër-íb kongur av Assýriu fór avstað, og fór og vendi aftur, og dvaldist í Nín´-ë-vëh.
38 Og tað bar á, sum hann tilbað í húsi Nis´-rŏch-s, guds síns, at À-drăm´-më-lëch og Sjă-rë´-zër, synir hansara, slógu hann við svørðinum; og teir komust undan inn í land Âr-më´-nï-ŭ: og Ë´-sâr-hăd´-dŏn, sonur hansara, ríkti í hansara stað.

KAPITUL 38

Í TEIMUM døgum varð Hëz-ë-kï´-ăh sjúkur at deyða. Og Esaiah prophetur Amoz sonur kom at honum, og segði við hann, Svá sigur HARRIN, Set hús títt í rættlag: tí at tú skalt doyggja, og ikki liva.
2 Tá vendi Hëz-ë-kï´-ăh andliti sínum ímóti múrinum, og bað at HARRANUM,
3 Og segði, Minst til nú, O HARRI, eg bøni teg, hvussu eg havi gingið frammi fyri tær í sannleika og við einum fullkomnum hjarta, og havi gjørt *tað sum er* gott í eygsjón tíni. Og Hëz-ë-kï´-ăh græt sáran.
4 ¶ Tá kom orð HARRANS til Esaiah, sigandi,
5 Far, og sig til Hëz-ë-kï´-ăh, Svá sigur HARRIN, Guð Dávids, faðirs tíns, Eg havi hoyrt tína bøn, eg havi sæð tíni tár: sí, eg vil leggja afturat tínum døgum fimtan ár.
6 Og eg vil bjarga tær og hesum staði út úr hondini á konginum av Assýriu: og eg vil verja henda stað.
7 Og hetta *skal vera* tær tekin frá HARRANUM, at HARRIN vil gera henda lut sum hann hevur talað;
8 Sí, eg vil føra aftur skuggan av gradunum, sum er farin niður á sólskivu Ahazar, tíggju gradur aftureftir. So sólin vendi aftur tíggju gradur, eftir hvørjum gradum hon var farin niður.
9 ¶ Skrivið hjá Hëz-ë-kï´-ăh kongi av Judah, tá ið hann hevði

verið sjúkur, og var komin aftur fyri seg frá síni sjúku:
10 Eg segði í avskeringini av mínum døgum, Eg skal fara til gravarportrini: eg eri frátikin fyri restina av mínum árum.
11 Eg segði, Eg skal ei síggja HARRAN, *enntá* HARRAN, í landi teirra livandi: eg skal ei meira skoða mann við íbúgvum heimsins.
12 Mín aldur er farin avstað, og er firraður frá mær sum eitt tjald hjá hirða: eg havi skorið av sum ein vevari mítt lív: hann vil skera meg av við fánandi sjúku: frá degi *enntá* til nátt vilt tú gera enda á mær.
13 Eg roknaði til morgun, *at,* sum ein leyva, so vilt tú bróta øll míni bein: frá degi *enntá* til nátt vilt tú gera enda á mær.
14 Sum ein trani, *ella* ein svala, soleiðis sprákaði eg: eg harmaði eins og ein dúgva: míni eygu bila *við at hyggja* uppeftir: O HARRI, eg eri niðurtryktur; gakk í ábyrgd fyri meg.
15 Hvat skal eg siga? hann hevur bæði talað við meg, og sjálvur hann hevur gjørt *tað:* eg skal fara eymligani øll míni ár í beiskleika sálar mínar.
16 O Harri, viðˆ hesum *lutum* liva *menn,* og í øllum hesum *lutum er* lív anda míns: so vilt tú endurbøta meg, og fáa meg at liva.
17 Sí, fyri frið hevði eg miklan beiskleika: men tú hevurt í kærleika móti míni sál *bjargað henni* frá spillunnar holu: tí at tú hevurt kastað allar mínar syndir afturum rygg tín.
18 Tí at grøvin kann ikki prísa tær, deyði kann *ikki* fagna tær: teir, sum fara niður inní holuna, kunnu ikki vóna eftir sannleika tínum.
19 Hin livandi, hin livandi, hann skal prísa tær, eins og eg *geri* henda dag: faðirin fyri børnunum skal gera kunnan tín sannleika.
20 HARRIN *var fúsur* at frelsa meg: tí vilja vit syngja mínar sangir til streingjaði ljóðførir allar dagarnar av okkara lívi í húsi HARRANS.
21 Tí at Esaiah hevði sagt, Lat teir taka ein klump av fikum, og leggja *tað* fyri eitt plástur uppá búldin, og hann skal koma aftur fyri seg.
22 Hëz-ë-kī´-ăh eisini hevði sagt, Hvat *er* tekinið *um* at eg skal fara niðan til húss HARRANS?

KAPITUL 39

Á TEIRRI tíð sendi Mër´-ô-dăch-băl´-ă-dăn, sonur Băl´-ă-dăn-s, kongur av Bábylon, brøv og eina gávu til Hëz-ë-kī´-ăh: tí at hann hevði hoyrt at hann hevði verið sjúkur, og var komin aftur fyri seg.
2 Og Hëz-ë-kī´-ăh var fegin um teir, og sýndi teimum hús sína dýrabæru luta, silvurið, og gullið, og kryddurtirnar, og hina dýrabæru salvu, og alt hús herbúnaðar síns, og alt sum fanst í dýrgripa*goymsl*um hansara: tað var einkið í húsi hansara, ella í øllum harradømi hansara, sum Hëz-ë-kī´-ăh sýndi teimum ikki.
3 ¶ Tá kom Esaiah prophetur at Hëz-ë-kī´-ăh kongi, og segði við hann, Hvat søgdu hesir menn? og hvaðani frá komu teir at tær? Og Hëz-ë-kī´-ăh segði, Teir eru komnir frá einum fjarløgdum landi at mær, *enntá* frá Bábylon.
4 Tá segði hann, Hvat hava teir sæð í húsi tínum? Og Hëz-ë-kī´-ăh svaraði, Alt, sum *er* í húsi mínum, hava teir sæð: tað er einkið millum alra mína dýrgripa, sum eg havi ikki sýnt teimum.
5 Tá segði Esaiah til Hëz-ë-kī´-ăh, Hoyr orðið hjá HARRA herliðanna:
6 Sí, teir dagar koma, at alt sum *er* í húsi tínum, og *tað* sum tínir fedrar hava lagt niðurfyri í

goymslu inntil henda dag, skal verða borið til Bábylon: einkið skal verða eftir, sigur HARRIN.

7 Og av sonum tínum, sum skulu renna út frá tær, sum tú skalt gita, skulu teir taka burtur; og teir skulu vera hirðmenn í slotti kongsins av Bábylon.

8 Tá segði Hëz-ë-kí´-äh til Esaiah, Gott *er* orðið hjá HARRANUM sum tú hevurt talað. Hann segði harafturat, Tí at tað skal vera friður og sannleiki í døgum mínum.

KAPITUL 40

UGGIÐ tit, uggið tit fólk mítt, sigur Guð tykkara.

2 Talið tit ugganarsamligani til Jerusalem, og rópið at henni, at hennara krígsførsla er fullførd, at hennara misgerð er náðað: tí at hon hevur móttikið av HARRANS hond tvífalt fyri allar syndir sínar.

3 ¶ Røddin á honum sum rópar í oyðuni, Fyribúgvið tit veg HARRANS, gerið beinan í oyðimørkini ein alfaraveg fyri Guð váran.

4 Hvør dalur skal verða upphevjaður, og hvørt fjall og heyggjur skulu verða gjørd lág: og tað krókuta skal verða gjørt beint, og tey knortlutu støðini sløtt:

5 Og HARRANS dýrd skal verða opinberað, og alt hold skal síggja *hana* tilsaman: tí at muður HARRANS hevur talað *tað*.

6 Røddin segði, Rópa. Og hann segði, Hvat skal eg rópa? Alt kjøt *er* gras, og allur tess glæsiligleiki *er* sum blóma akursins:

7 Grasið visnar, blóman følnar: av tí at andi HARRANS blæsur omanyvir tað: vissuliga, fólkið *er* gras.

8 Grasið visnar, blóman følnar: men orð Guðs várs skal standa um ævir.

9 ¶ O Zion, sum bert góð tíðindir, slepp tær niðan á hitt høga fjall; O Jerusalem, sum bert góð tíðindir, lyft upp tína rødd við styrki; lyft *hana* upp, ver ikki rædd; sig við staðirnar av Judah, Sí Guð tykkara!

10 Sí, Harrin GUÐ vil koma við sterkari *hond,* og hans armur skal stjórna fyri hann: sí, hans endurgjald *er* við honum, og hansara verk frammanfyri honum.

11 Hann skal føða sítt fylgi sum ein hirði: hann skal savna lombini við armi sínum, og bera *tey* í barmi sínum; *og* skal lagaliga leiða tær sum eru við smá.

12 ¶ Hvør hevur mált vøtnini í lógva handar sínar, og mátað upp himin við sponnini, og fevnt um dust jarðarinnar í einum máli, og vigað fjøllini í vektum, og heyggjarnar í eini vágskál?

13 Hvør hevur leiðbeint Anda HARRANS; ella, *sum verandi* ráðgevi hans, hevur lært hann?

14 Við hvønn ráðførdist hann, og *hvør* undirvísti honum, og lærdi hann á rás dómsins, og lærdi hann kunnleika, og sýndi fyri honum veg skilsins?

15 Sí, tjóðirnar *eru* sum ein dropi í spann, og verða roknaðar sum tað smáa støvið av vágskálini: sí, hann tekur upp oyggjarnar sum ein sera lítlan lut.

16 Og Lí´-bă-nŏn *er* ikki tilstrekkiligt at brenna, ella djórini harav tilstrekkilig til eitt brennioffur.

17 Allar tjóðir frammi fyri honum *eru* sum einkið; og tær verða roknaðar fyri honum minni enn einkið, og fáfongd.

18 ¶ Við hvønn tá vilja tit líkna Guð? ella hvønn líkleika vilja tit samlíkna at honum?

19 Verkamaðurin bræðir eina rista mynd, og gullsmiðurin breiðir hana yvir við gulli, og stoypir silvur ketur.

20 Hann, sum *er* so útarmaður, at hann einkið tilbiðjanaroffur hevur, velur eitt træ, *sum*

vil ikki rotna; hann leitar sær ein hegnisligan verkamann at fyribúgva eina rista mynd, *sum* skal ikki verða vikað.

21 Hava tit ikki vitað? hava tit ikki hoyrt? hevur tað ikki verðið sagt tykkum frá byrjanini? hava tit ikki skilt frá grundleggingum jarðarinnar?

22 *Tað er* hann sum situr uppiá kringi jarðarinnar, og hennara íbúgvar *eru* sum grashoppur; sum strekkir út himnarnar sum ein dúk, og breiðir teir út sum eitt tjald at búgva í:

23 Sum førir prinsarnar til einkiðs; hann ger dómarar jarðarinnar sum fáfongd.

24 Ja, teir skulu ei verða plantaðir; ja, teir skulu ei verða sáðaðir: ja, teirra stamma skal ei sláa rót á jørðini: og hann skal eisini blása omanyvir teir, og teir skulu følna, og meldurvindurin skal taka teir burtur sum hálm.

25 Við hvønn tá vilja tit líkna meg, ella skal eg vera javnur *við?* sigur Hin Heilagi.

26 Hevjið upp eygum tykkara til hæddar, og skoðið hvør hevur skapt hesi *ting,* sum førir út teirra herlið eftir tali: hann kallar tær allar við nøvnum eftir mikilleikanum av sínum mátti, tí *hann er* sterkur í kraft; ikki ēin svitast.

27 Hví sigurt tú, O Jákob, og talart, O Ísrael, Mín vegur er fjaldur frá HARRANUM, og mín dómur er lopin um frá Guði mínum?

28 ¶ Hevurt tú ikki vitað? hevurt tú ikki hoyrt, *at* hin ævigtvarandi Guð, HARRIN, Skaparin av endum jarðarinnar, ørmaktast ikki, eiheldur er móður? *tað finst* eingin rannsaking av hansara skili.

29 Hann gevur kraft til hin ørmaktaða; og til *teirra, sum* ongan mátt *hava,* hann økir styrki.

30 Sjálvt ungdómarnir skulu ørmaktast og verða givnir, og teir ungu menninir skulu aldeilis falla:

31 Men teir, sum bíða eftir HARRANUM, skulu endurnýggja *sína* styrki; teir skulu hevja *seg* upp við veingjum líkasum ørnir; teir skulu renna, og ei verða móðir; *og* teir skulu ganga, og ikki maktast.

KAPITUL 41

HALDIÐ tøgn frammi fyri mær, O oyggjar; og lat fólkið endurnýggja *sína* styrki: lat teir koma nær; síðan lat teir tala: latum okkum koma nær saman til dóms.

2 Hvør reisti upp hin rættvísa *mann* úr eystri, kallaði hann til fót sín, gav tjóðirnar frammi fyri honum, og fekk *hann at* stjórna yvir kongum? hann gav *teir* sum støvið til svørð hans, *og* sum riknan hálm til boga hans.

3 Hann elti teir, *og* fór framvið tryggliga; *enntá* eftir veginum *sum* hann ikki var farin við fótum sínum.

4 Hvør hevur virkað og gjørt *tað,* kallandi ættarliðirnar frá byrjanini? eg HARRIN, hin fyrsti, og hjá teimum síðstu; eg *eri* hann.

5 Oyggjarnar sóu *tað,* og óttaðust; endar jarðarinnar vórðu ræddir, nærkaðust, og komu.

6 Teir hjálptu hvør *og* ēin næsta sínum; og *hvør og ēin* segði til bróður sín, Ver við gott treyst.

7 So træsmiðurin tilstuðlaði gullsmiðinum, *og* hann, sum javnar *við* hamaranum, honum sum sló amboltin, sigandi, Tað *er* klárt til loddingina: og hann festi tað við naglum, *at* tað skuldi ei verða vikað.

8 Men tú, Ísrael, *ert* tænari mín, Jákob, hvønn eg havi valt, sáð Abrahams, vinar míns.

9 *Tú,* sum eg havi tikið frá endum jarðarinnar, og kallað teg frá hinum fremstu monnum harav, og sagt við teg, Tú *ert* tænari

mín; eg havi valt teg, og ikki kastað teg burtur.

10 ¶ Óttast tú ikki; tí at eg *eri* við tær: ver ikki mótfallin; tí at eg *eri* Guð tín: eg vil styrkja teg; ja, eg vil hjálpa tær; ja, eg vil halda tær uppi við høgru hond rættvísi mínar.

11 Sí, allir teir, sum vóru uppøstir ímóti tær, skulu skammast og fjamskast: teir skulu verða sum einkið; og teir, sum stríðast við teg, skulu týnast.

12 Tú skalt søkja teir, og skalt ikki finna teir, *enntá* teir sum stríddust við teg: teir, sum kríggjast ímóti tær, skulu verða sum einkið, og sum eitt ting av ongum *virði.*

13 Tí at eg, HARRIN Guð tín, vil halda høgru hond tína, sigandi við teg, Óttast ikki; eg vil hjálpa tær.

14 Óttast ikki, tú ormur Jákob, *og* tit menn av Ísrael; eg vil hjálpa tær, sigur HARRIN, og tín endurloysari, Hin Heilagi Ísraels.

15 Sí, eg vil gera teg *til* eitt nýtt hvast treskiamboð, havandi tenn: tú skalt treskja fjøllini, og berja *tey* smá, og skalt gera heyggjarnar sum dumbu.

16 Tú skalt foykja tey, og vindurin skal bera tey burt, og meldurvindurin skal spjaða tey: og tú skalt fegnast í HARRANUM, *og* skalt dýrda í Hinum Heilaga Ísraels.

17 *Tá ið* teir ørmu og tørvandi søkja vatn, og einkið *er, og* teirra tunga svíkur av torsta, eg, HARRIN, vil hoyra teir; *eg,* Guð Ísraels, vil ikki yvirgeva teir.

18 Eg vil opna løkir í høgum plássum, og keldur í miðjum dølunum: eg vil gera oyðuna *til* ein hyl av vatni, og tað turra landið *til* lindir av vatni.

19 Eg vil planta í oyðuni sedris*træið*, sjít-tah-træið, og myrtu*træið*, og oljutræið; eg vil seta í oyðimørkini aðalgranntræið, *og* furu*træið*, og bukstræið tilsaman:

20 At teir mega síggja, og vita, og umhugsa, og fata tilsaman, at hond HARRANS hevur gjørt hetta, og Hin Heilagi Ísraels hevur skapt tað.

21 Leggið fram tykkara søk, sigur HARRIN; berið fram tykkara sterku *grundgevingar,* sigur Kongur Jákobs.

22 Lat teir bera *tær* fram, og sýna okkum hvat henda skal: lat teir sýna hini fyrru ting, hvat tey *veri seg,* at vit mega umhugsa tey, og skyna hin seinna enda teirra; ella kunngerið okkum ting *sum* eiga at koma.

23 Sýnið tingini sum eiga at koma hereftir, at vit mega vita at tit *eru* gudar: ja, gerið gott, ella gerið ilt, at vit mega verða mótfalnir, og skoða *tað* tilsaman.

24 Sí, tit *eru* til einkiðs, og tykkara verk fyri ongum: ein andstygd *er hann sum* velur tykkum.

25 Eg havi reist upp *ēin* úr norðan, og hann skal koma: frá rísing sólarinnar skal hann kalla uppá navn mítt: og hann skal koma uppá prinsar sum *uppá* mørtil, og sum leirkerasmiðurin treður leir.

26 Hvør hevur kunngjørt frá byrjanini, at vit mega vita? og fyrr í tíð*ini,* at vit mega siga, *Hann er* rættvísur? ja, *tað er* eingin sum sýnir, ja, *tað er* eingin sum kunnger, ja, *tað er* eingin sum hoyrir orð tykkara.

27 Hin fyrsti *skal siga* til Zion, Sí, sí teir: og eg vil geva til Jerusalem ēin sum ber góð tíðindir.

28 Tí at eg skoðaði, og *har var* eingin maður; enntá teirra millum, og *har var* eingin ráðgevari, sum, tá ið eg spurdi av teimum, kundi svara eitt orð.

29 Sí, teir *eru* allir fáfongd; teirra verk *eru* einkið: teirra bræddu myndir *eru* vindur og ørkymlan.

KAPITUL 42

SÍ tænara mín, hvønn eg haldi uppi; mín útvalda, *í hvørjum* sál mín fragdast; eg havi lagt mín anda uppá hann: hann skal føra fram dóm til Heidninganna.

2 Hann skal ikki rópa, ella lyfta upp, ella volda síni rødd at verða hoyrda á gøtunum.

3 Eitt brákað rør skal hann ikki bróta, og hin rúkandi veik skal hann ikki sløkkja: hann skal føra fram dóm at sannleika.

4 Hann skal ikki bila, ella verða mótfallin, til hann havi sett dóm á jørðini: og oyggjarnar skulu bíða eftir lóg hansara.

5 ¶ Svá sigur Guð HARRIN, hann sum skapti himnarnar, og tandi teir út; hann sum breiddi fram jørðina, og tað sum kemur úr henni; hann sum gevur fólkinum andadrátt uppiá henni, og anda til teirra sum ganga hará:

6 Eg, HARRIN, havi kallað teg í rættvísi, og vil halda hond tína, og vil varðveita teg, og geva teg til ein sáttmála fólksins, til eitt ljós hjá heidningunum;

7 At opna hini blindu eygu, at føra út fangarnar frá fongslinum; *og* teir, sum sita í myrkri, út úr fangahúsinum.

8 Eg *eri* HARRIN: tað *er* mítt navn: og mína dýrd vil eg ikki geva til ein annan, eiheldur mítt lov til ristar myndir.

9 Sí, hini fyrru ting eru borin á, og nýggj ting kunngeri eg: áður enn tey spretti fram, sigi eg tykkum um tey.

10 Syngið HARRANUM ein nýggjan song, *og* hansara lov frá enda jarðarinnar, tit sum fara oman til havið, og alt sum er harí; oyggjarnar, og íbúgvarnir harhjá.

11 Lat oyðuna og staðirnar harav lyfta upp *sína rødd,* bygdirnar *sum* Kẽ-dăr íbýr: lat klettarins íbúgvar syngja, lat teir rópa frá toppi fjallanna.

12 Lat teir geva dýrd at HARRANUM, og kunngera hansara lov í oyggjunum.

13 HARRIN skal fara fram sum ein mektigur maður, hann skal øsa upp ástbrelni sum ein krígsmaður: hann skal geyla, ja, ýla; hann skal sigra ímóti sínum figgindum.

14 Eg havi langa tíð hildið friði mínum; eg havi verið stillur, *og* hildið mær aftur: *nú* vil eg geyla sum ein verkjandi kvinna; eg vil oyða og upptæra alt fyri eitt.

15 Eg vil gera fjøll og heyggjar oyðin, og turka upp allar teirra urtir; og eg vil gera løkirnar *til* oyggjar, og eg vil turka upp hyljarnar.

16 Og eg vil føra hinar blindu eftir einum vegi *sum* teir kendu ikki; eg vil leiða teir í gøtum *sum* teir hava ikki kent: eg vil gera myrkur *til* ljós frammi fyri teimum, og krókutar lutir beinar. Hesi ting vil eg gera teimum, og ikki yvirgeva teir.

17 ¶ Teir skulu verða vendir tilbakar, teir skulu stórliga skammast, sum troysta á ristar myndir, sum siga til hinar bræddu myndir, Tit *eru* gudar várir.

18 Hoyrið, tit deyvu; og hyggið, tit blindu, at tit mega síggja.

19 Hvør *er* blindur, uttan tænari mín? ella deyvur, sum sendiboð mítt *sum* eg sendi? hvør *er* blindur sum *hann sum er* fullkomin, og blindur sum tænari HARRANS?

20 Síggjandi mong ting, men tú gáart ikki eftir; opnandi oyruni, men hann hoyrir ikki.

21 HARRIN er væl toknaður fyri hansara rættvísis skuld; hann vil gera lógina stóra, og gera *hana* heiðursama.

22 Men hetta *er* eitt fólk, rænt og herjað; *teir eru* allir av teimum fjøtraðir í holum, og teir eru fjald-

ir í fangahúsum: teir eru til ein fong, og eingin útfríar; til eitt rán, og eingin sigur, Bøt aftur.

23 Hvør tykkara millum vil læna oyra til hetta? *hvør* vil geva gætur og hoyra fyri tíðina sum koma skal?

24 Hvør gav Jákob til eitt rán, og Ísrael til ránsmenninar? gjørdi ikki HARRIN, hann, ímóti hvørjum vit hava syndað? tí at teir vildu ei ganga í vegum hansara, eiheldur vóru teir lýdnir hansara lóg.

25 Tí hevur hann helt omanyvir hann øðina av síni firtni, og bardaga-styrkina: og tað hevur sett eld á hann runt um, tó skynaði hann ikki; og tað brendi hann, tó legði hann *tað* ikki á hjarta.

KAPITUL 43

MEN nú, svá sigur HARRIN sum skapaði teg, O Jákob, og hann sum myndaði teg, O Ísrael, Óttast ikki: tí at eg havi endurloyst teg, eg havi kallað *teg* við navni tínum; tú *ert* mín.

2 Tá ið tú fert gjøgnum vøtnini, eg *vil vera* við tær; og gjøgnum áirnar, tær skulu ikki yvirfloyma teg: tá ið tú gongurt ígjøgnum eldin, tú skalt ei verða brendur; eiheldur skal login kynda uppiá tær.

3 Tí at *eg* eri HARRIN Guð tín, Hin Heilagi Ísraels, tín Frelsari: eg gav Egyptaland *til* loysigjald títt, Ê-thĭ-ō´-pĭ-ŭ og Sē´-bă fyri teg.

4 Við tað at tú vart dýrabærur í míni eygsjón, hevurt tú verið heiðursamur, og eg havi elskað teg: tí vil eg geva menn fyri teg, og fólk fyri títt lív.

5 Óttast ikki: tí at eg *eri* við tær: eg vil føra sáð títt úr eystri, og savna teg úr vestri;

6 Eg vil siga til norðan, Gev upp; og til sunnan, Halt ikki tilbakar: kom við sonum mínum langt burturifrá, og døtrum mínum frá endum jarðarinnar;

7 *Enntá* hvørjum tí sum er kallaður við navni mínum: tí at eg havi skapt hann til dýrd mína, eg havi myndað hann; ja, eg havi gjørt hann.

8 ¶ Førið fram hitt blinda fólk sum hava eygu, og tey deyvu sum hava oyru.

9 Latið allar tjóðirnar verða savnaðar saman, og latið fólkið verða fylkjað: hvør teirra millum kann kunngera hetta, og sýna okkum fyrri ting? lat teir føra fram síni vitnir, at teir mega verða rættvísgjørdir: ella lat teir hoyra, og siga, *Tað er* sannleiki.

10 Tit *eru* vitnir míni, sigur HARRIN, og mín tænari sum eg havi valt: at tit mega vita og trúgva mær, og skilja at eg *eri* hann: undan mær var eingin Guð myndaður, eiheldur skal tað vera eftir meg.

11 Eg, *enntá* eg, *eri* HARRIN; og umframt meg *er* eingin frelsari.

12 Eg havi kunngjørt, og havi frelst, og eg havi sýnt, tá ið eingin fremmandur *gudur var* tykkara millum: tí *eru* tit míni vitnir, sigur HARRIN, at eg *eri* Guð.

13 Ja, áðrenn dagurin *varð,* eg *eri* hann; og *tað er* eingin sum kann útfría út úr hond míni: eg vil virka, og hvør skal forða tí?

14 ¶ Svá sigur HARRIN, tykkara endurloysari, Hin Heilagi Ísraels; Fyri tykkara skyld havi eg sent til Bábylon, og havi ført niður allar teirra tignarmenn, og Chăl-dē´-ararnar, hvørs róp *er* í skipunum.

15 Eg *eri* HARRIN, Hin Heilagi tykkara, skapari Ísraels, tykkara Kongur.

16 Svá sigur HARRIN, sum ger veg í sjónum, og eina gøtu í hinum mektigu vøtnum;

17 Sum førir fram vagnin og hest, herin og máttin; teir skulu leggjast niður saman, teir skulu ikki rísa: teir eru útslettaðir, teir eru sløktir sum veikur.

18 ¶ Minnist tit ei hini fyrru ting, eiheldur umhugsið lutirnar úr forðum.
19 Sí, eg vil gera eitt nýtt ting; nú skal tað spretta fram; skulu tit ikki skyna tað? eg vil enntá gera ein veg í oyðuni, *og* løkir í oyðimørkini.
20 Akursins djór skal æra meg, drekarnir og uglurnar: av tí at eg gevi vøtn í oyðuni, *og* løkir í oyðimørkini, at geva drekka til fólks míns, míns útvalda.
21 Hetta fólk havi eg myndað til sjálvs míns; teir skulu sýna fram prís mítt.
22 ¶ Men tú hevurt ikki kallað uppá meg, O Jákob; men tú hevurt verið móður av mær, O Ísrael.
23 Tú hevurt ikki ført mær hin smáa fenað brenniofra tína, eiheldur hevurt tú ært meg við tínum sláturofrum. Eg havi ikki volt tær at tænt við einum ofri, ella møtt teg við roykilsi.
24 Tú hevurt einkið søtt rør keypt mær við peningi, eiheldur hevurt tú mettað meg við feittinum av tínum sláturofrum: men tú hevurt fingið meg at tæna við tínum syndum, tú hevurt troyttað meg við tínum misgerðum.
25 Eg, *enntá* eg, *eri* hann sum slettar út tíni misbrot fyri mína egnu skyld, og vil ikki minnast tínar syndir.
26 Minnið meg á: latum okkum føra søk saman: kunnger tú, at tú mást verða rættvísgjørdur.
27 Tín fyrsti faðir hevur syndað, og tínir lærarar hava misbrotist ímóti mær.
28 Tí havi eg vanhalgað prinsar halgidómsins, og havi givið Jákob til banningina, og Ísrael til spottanir.

KAPITUL 44

TÓ nú hoyr, O Jákob, tænari mín; og Ísrael, sum eg havi valt:
2 Svá sigur HARRIN sum gjørdi teg, og myndaði teg frá móðurlívinum, *sum* vil hjálpa tær; Óttast ikki, O Jákob, tænari mín; og tú, Jēs'-ū-rūn, sum eg havi valt.
3 Tí at eg vil hella vatn uppá hann sum er tyrstur, og flóðir uppá hitt turra lendi: eg vil hella mín anda uppá sáð títt, og mína signing uppá avkom títt:
4 Og teir skulu spretta upp *sum* millum grasið, sum pílatrø hjá" vatn-rásunum.
5 Ein skal siga, Eg *eri* HARRANS, og ein annar skal kalla *seg* eftir navni Jákobs; og ein annar skal tilskrivast HARRANUM *við* hond síni, og tilnevna *seg* eftir navni Ísraels.
6 Svá sigur HARRIN — Kongur Ísraels, og hans endurloysari — HARRI herliðanna; Eg *eri* hin fyrsti, og eg *eri* hin síðsti; og umframt meg *er* eingin Guð.
7 Og hvør, sum eg, skal kalla, og skal kunngera tað, og seta tað í rættlag fyri meg, síðan eg útnevndi fyrndar fólkið? og tingini sum koma, og skulu koma, lat teir sýna at teimum.
8 Óttist tit ikki, eiheldur verið bangnir: havi eg ikki talt tær frá tí tíðini, og havi kunngjørt *tað?* tit *eru* enntá míni vitnir. Er ein Guð umframt meg? ja, eingin Guð *er;* eg veit ikki *nakran*.
9 ¶ Teir, sum gera eina rista mynd, *eru* allir av teimum fáfongd; og teirra fragdsomu ting skulu ikki gagna; og teir *eru* síni egnu vitnir; teir síggja ikki, ella vita; at teir mega skammast.
10 Hvør hevur myndað ein gud, ella brætt eina rista mynd *sum* ikki nyttar til nakað?
11 Sí, allir hansara felagar skulu skammast: og verkamenninir, teir *eru* av monnum: lat teir allar verða savnaðar saman, lat teir standa upp; *tó* skulu teir óttast, *og* teir skulu skammast tilsaman.

12 Smiðurin við klovanum bæði arbeiðir í kolunum, og snikkar hana við hamarum, og virkar hana við styrkini av sínum ørmum: ja, hann er svangur, og hansara styrki bilar: hann drekkur einkið vatn, og er lúgvaður.

13 Træsmiðurin strekkir út *sína* strikufjøl; hann merkir hana upp við eini ál; hann passar hana við høvlum, og hann merkir hana upp við passaranum, og ger hana eftir skapinum hjá einum manni; samsvarandi við vakurleikan hjá einum manni, at hon má verða verandi í húsinum.

14 Hann høggur sær niður sedris*trø,* og tekur sypris*træið* og eiki*træið,* sum hann styrkir til sín sjálvs millum skógartrøini: hann plantar eitt aski*træ,* og regnið nørir *tað*.

15 Tá skal hon verða hjá einum manni at brenna: tí at hann vil taka harav, og verma seg sjálvan; ja, hann kyndir *hana,* og bakar breyð; ja, hann ger ein gud, og tilbiður *hann;* hann ger tað *til* eina rista mynd, og fellur niður fyri tí.

16 Hann brennur part harav í eldinum; við parti harav hann etur kjøt; hann steikir steik, og er mettaður: ja, hann vermir *seg,* og sigur, Há, eg eri heitur, eg havi sæð eldin:

17 Og hitt eftirverandi harav ger hann *til* ein gud, *enntá* sína ristu mynd: hann fellur niður at tí, og tilbiður *tað,* og biður at tí, og sigur, Bjarga mær; tí at tú *ert* gud mín.

18 Teir hava ikki skynað, ella skilt: tí hann hevur lokað teirra eygu, at teir ei kunnu sjá; *og* teirra hjørtu, at teir ei kunnu skilja.

19 Og eingin umhugsar í sínum hjarta, eiheldur *er* kunnleiki, ella skil, til at siga, Eg havi brent part av henni í eldinum; ja, eisini havi eg bakað breyð uppiá kolunum harav; eg havi steikt kjøt, og etið *tað:* og skal eg gera hitt eftirverandi harav *til* eina andstygd? skal eg falla niður fyri stammuni av einum træi?

20 Hann føðir *seg uppá* øskur: eitt tølt hjarta hevur vent honum til viks, at hann kann ikki bjarga síni sál, ella siga, *Er* ikki ein lygn í míni høgru hond?

21 ¶ Minst til hesi, O Jákob og Ísrael; tí at tú *ert* tænari mín: eg havi myndað teg; tú *ert* tænari mín: O Ísrael, tú skalt ei verða gloymdur av mær.

22 Eg havi slettað út, sum eitt tjúkt skýggj, tíni misbrot, og sum eitt skýggj tínar syndir: vend aftur at mær; tí at eg havi endurloyst teg.

23 Syngið, O tit himnar; tí at HARRIN hevur gjørt *tað:* rópið, tit lægru partar jarðarinnar: brótið fram yvirí synging, tit fjøll, O skógur, og hvørt træ harí: tí at HARRIN hevur endurloyst Jákob, og dýrðmett seg sjálvan í Ísrael.

24 Svá sigur HARRIN, tín endurloysari, og hann sum myndaði teg frá móðurlívinum, Eg *eri* HARRIN sum ger allar *lutir;* sum tenur fram himnarnar aleinaur; sum breiðir útum jørðina sjálvur;

25 Sum ónýtir teknini hjá lygnarunum, og ger spásagnarfólk ør; sum vendir vís*monnum* afturá, og ger teirra kunnleika dársaman;

26 Sum staðfestir orðið hjá tænara sínum, og fremur ráðið hjá sendiboðum sínum; sum sigur til Jerusalem, Tú skalt verða búð í; og til staðirnar av Judah, Tit skulu verða bygdir, og eg vil reisa upp tess illa farnu pláss:

27 Sum sigur til djúpið, Ver turt, og eg vil turka upp áir tínar:

28 Sum sigur um Cýrus, *Hann er* mín hirði, og skal útinna alla mína fragd: enntá sigandi til Jerusalem, Tú skalt verða bygd; og til templið, Tín grundvøllur skal verða lagdur.

KAPITUL 45

SVÁ sigur HARRIN til salvaða síns, til Cýrusar, hvørs høgru hond eg havi hildið, til at undirleggja tjóðir frammi fyri honum; og eg vil loysa lendarnar á kongum, til at opna frammi fyri honum hini tvey veingjaðu portur; og portrini skulu ei verða lokað;

2 Eg vil fara undan tær, og gera tey krókutu plássini bein: eg vil bróta í stykkir portrini av messing, og skera sundur lokurnar av jarni:

3 Og eg vil geva tær dýrgripir myrkursins, og fjaldar ríkdómar loyndra plássa, at tú mást skyna, at eg, HARRIN, sum kalli *teg* við navni tínum, *eri* Guð Ísraels.

4 Fyri Jákobs, tænara míns, skuld, og Ísrael, mín útvalda, havi eg enntá kallað teg við navni tínum: eg havi tilnevnt teg, tó *at* tú hevurt ikki kent meg.

5 ¶ Eg *eri* HARRIN, og eingin annar *er,* eingin Guð *er* umframt meg: eg gyrdi teg, tó *at* tú hevurt ikki kent meg:

6 At teir mega vita frá rísing sólarinnar, og frá vestri, at *tað er* eingin umframt meg. Eg *eri* HARRIN, og *tað er* eingin annar.

7 Eg myndi ljósið, og skapi myrkur: eg fái í lag frið, og skapi ilt: eg, HARRIN, geri øll hesi *ting*.

8 Drúpið niður, tit himnar, úr erva, og helli skýggini niður rættvísi: lat jørðina opna *seg,* og lat tey bera fram frelsu, og lat rættvísi spretta upp tilsaman; eg, HARRIN, havi skapað tað.

9 Vei honum sum stríðir við Skapara sín! *Lat* pottabrotið *stríða* við pottabrotˇ jarðarinnar. Skal leirið siga til hansara sum snikkar tað, Hvat gert tú? ella verk títt, Hann hevur ongar hendur?

10 Vei honum sum sigur við faðir *sín,* Hvat giturt tú? ella til kvinnuna, Hvat hevurt tú borið fram?

11 Svá sigur HARRIN, Hin Heilagi Ísraels, og Skapari hans, Spyr meg um ting sum koma skulu viðvíkjandi sonum mínum, og viðvíkjandi verki handa mína ábjóðið tit mær.

12 Eg havi gjørt jørðina, og skapt mann uppiá henni: eg, *enntá* hendur mínar, hava tant út himnarnar, og øllum teirra herliði havi eg áboðið.

13 Eg havi reist hann upp í rættvísi, og eg vil leiðbeina allar hans vegir: hann skal byggja mín stað, og hann skal lata fara mínar fangar, ikki fyri prís, ella endurgjald, sigur HARRI herliðanna.

14 Svá sigur HARRIN, Egyptalands strev, og handilsvørurnar hjá Ê-thĭ-ō´-pĭ-ŭ og hjá Sâ-bē´-arunum, monnum av vakstrarmáli, skal koma yvir at tær, og tey skulu verða tíni: teir skulu koma eftir tær; í ketum skulu teir koma yvir, og teir skulu falla niður at tær, teir skulu gera umbøning at tær, *sigandi,* Vissuliga, Guð *er* í tær; og *tað er* eingin annar, *tað er* eingin Guð.

15 Sanniliga, tú *ert* ein Guð sum fjalirt teg sjálvan, O Guð Ísraels, Frelsarin.

16 Teir skulu skammast, og eisini fjamskast, allir av teimum: teir skulu fara til ørkymlanar tilsaman *sum eru* gerarar av skurðgudum.

17 *Men* Ísrael skal vera frelstur í HARRANUM við eini ævigtvarandi frelsu: tit skulu ikki skammast, ella fjamskast, verøld uttan enda.

18 Tí at svá sigur HARRIN sum skapaði himnarnar; Guð sjálvur sum myndaði jørðina og gjørdi hana; hann hevur grundfest hana, hann skapaði hana ikki til fánýtis, hann myndaði hana til at verða búgvin í: eg *eri* HARRIN; og *tað er* eingin annar.

19 Eg havi ikki talað í loyndum,
í einum myrkum plássi jarðarinnar:
eg segði ikki við sáð Jákobs,
Søkið tit meg til fánýtis:
eg, HARRIN, tali rættvísi,
eg kunngeri lutir sum eru rættir.

20 ¶ Fylkið tykkum og komið;
dragist nær tilsaman, tit *ið hava*
komist undan úr tjóðunum:
teir hava ongan kunnleika
sum seta upp viðin av síni ristu mynd,
og biðja at einum gudi *sum* kann ikki frelsa.

21 Sigið tit frá, og førið *teir* nær;
ja, latið teir leggja ráð tilsaman:
hvør hevur kunngjørt hetta frá fyrndar tíð?
hvør hevur sagt frá tí frá teirri tíð?
havi ikki eg, HARRIN?
og *tað er* eingin Guð annars umframt meg;
ein rættlátur Guð og ein Frelsari;
tað er eingin umframt meg.

22 Lítið at mær, og verðið tit frelstir,
allir endar jarðarinnar:
tí at eg *eri* Guð, og *tað er* eingin annar.

23 Eg havi svorið við meg sjálvan,
orðið er farið út úr munni mínum *í* rættvísi,
og skal ei venda aftur,
At yvirfyri mær skal hvørt knæ boyggja *seg,*
hvør tunga skal svørja.

24 Vissuliga, skal *ēin* siga, í HARRANUM havi eg rættvísi og styrki:
enntá til hansara skulu *menn* koma;
og allir, sum eru østir ímóti honum, skulu skammast.

25 Í HARRANUM skal alt sáð Ísraels verða rættvísgjørt, og skal dýrda.

KAPITUL 46

BEL boyggir *seg* niður, Nē´-bō hýkur,
teirra skurðgudar vóru uppiá djórunum, og uppiá fenaðinum:
tykkara burðar*akfør vóru*
tungt løddi;
teir eru ein byrði fyri tí útmødda *djórinum*.

2 Teir húka, teir boyggja *seg* niður tilsaman;
teir kundu ikki avhenda byrðina,
men *teir* sjálvir eru farnir inn í fangaskap.

3 ¶ Lýðið á meg, O Jákobs hús,
og øll leivdin av Ísraels húsi,
sum eru bornir *av mær* frá kviðinum,
sum eru bornir frá móðurlívinum:

4 Og *enntá* til gamla aldur *tykkara,*
eg *eri* hann;
og *enntá* til grá hár vil eg bera *tykkum:*
eg havi gjørt, og eg vil bera;
enntá eg vil bera, og vil bjarga *tykkum*.

5 ¶ Við hvønn vilja tit líkna meg,
og gera *meg* javnan,
og sammeta meg, at vit mega vera líkir?

6 Teir oyðsla gull úr posanum,
og viga silvur í vágskálini,
og leiga ein gullsmið;
og hann ger tað *til* ein gud:
teir falla niður, ja, teir tilbiðja.

7 Teir bera hann uppiá økslini,
teir bera hann,
og seta hann í pláss hansara,
og hann stendur;
frá hansara plássi skal hann ei flyta burt:
ja, *ēin* skal rópa at honum,
tó kann hann ikki svara,
ella frelsa hann úr hansara trongd.

8 Minnist hetta, og sýnið tykkum sjálvar menn:
førið *tað* aftur til hugs, O tit misbrótarar.

9 Minnist til hini fyrru ting úr fordum:
tí at eg *eri* Guð,
og *tað er* eingin annar;
eg eri Guð,
og *tað er* eingin líka *sum* eg,

10 Kunngerandi endan frá byrjanini,
og frá fyrndar tíðum *tey tingini* sum eru ikki *enn* gjørd,
sigandi, Ráð mítt skal standa,
og eg vil gera alla mína fragd:

11 Kallandi ein ránskan fugl úr eysturi;
mannin sum útinnir mítt ráð,
frá einum fjarløgdum landi:
ja, eg havi talað *tað,*
eg vil eisini fáa tað til at bera á;
eg havi avrátt *tað,*
eg vil eisini gera tað.

12 ¶ Lýðið á meg, tit seighjartaðu,
sum *eru* fjart frá rættvísi:

13 Eg føri nær mína rættvísi;
hon skal ei vera langt burturi,
og mín frelsa skal ikki drála:
og eg vil staðseta frelsu í Zion fyri Ísrael mína dýrd.

KAPITUL 47

KOM oman og setst í støvið, O jomfrúdóttir Bábylons, setst á jørðina: *har er* einkið hásæti, O dóttir Chăl-dē´-anna: tí at tú skal ei meira verða kallað eym og stásilig.

2 Tak kvarnarsteinarnar, og mal mjøl: avdekka lokkar tínar, ger beran leggin, avdekka lend tína, far yvirum áirnar.

3 Tín nakni skal verða avdekkað, ja, tín skomm skal verða sædd: eg vil taka hevnd, og eg vil ikki møta *tær sum* ein maður.

4 *Hvat* okkara loysnara *viðvíkur,* HARRI herliðanna *er* navn hans, Hin Heilagi Ísraels.

5 Sit tú tigandi, og far tær inn í myrkur, O dóttir Chăl-dē´-anna: tí at tú skalt ei meira verða kallað, Frúgv kongadøma.

6 ¶ Eg var vreiður við fólk mítt, eg havi óreinkað mín arv, og givið teir inn í hond tína: tú sýndirt teim onga miskunn; uppá hin avgamla hevurt tú sera tungliga lagt títt ok.

7 ¶ Og tú segðirt, Eg skal vera ein frúgv um ævir: *so* at tú legðirt ei hesi *ting* á títt hjarta, eiheldur mintirst tú til hin seinna enda av tí.

8 Tessvegna hoyr nú hetta, *tú sum ert* givin til njótinga, sum býrt stúranarleysliga, sum sigurt í hjarta tínum, Eg *eri,* og eingin annar umframt meg; eg skal ikki sita *sum* ein einkja, eiheldur skal eg kenna missin av børnum:

9 Men hesi tvey *ting* skulu koma til tín í einum eygnabragdi í ēinum degi, missurin av børnum, og einkjuskapur: tey skulu koma omanyvir teg í sínum fullkominleika fyri fjøldina av tínum gandanum, *og* fyri miklu fjøldina av tínum gandakvøðingum.

10 ¶ Tí at tú hevurt litið á vondsku tína: tú hevurt sagt, Eingin sær meg. Tín vísdómur og tín kunnleiki, hann hevur spilt teg; og tú hevurt sagt í hjarta tínum, Eg *eri,* og eingin annar umframt meg.

11 ¶ Tí skal ilt koma omanyvir teg; tú skalt ikki vita hvaðani frá tað rísur: og mein skal falla uppá teg; tú skalt ikki vera før fyri at koyra tað av: og oyðing skal koma uppá teg brádliga, *sum* tú skalt ikki skyna.

12 Statt nú við gandakvøðingum tínum, og við fjøldini av tínum gandanum, hvarí tú hevurt strevað frá ungdómi tínum; um so veri *at* tú skalt vera før fyri at gagna, um so veri *at* tú kanst sigra.

13 Tú ert útlúgvað í fjøldini av tínum ráðum. Lat nú stjørnuspáararnar, stjørnustararnar, hinar mánaðarligu fyrivitararnar, standa upp, og frelsa teg frá *hesum tingunum* sum skulu koma uppá teg.

14 Sí, teir skulu vera sum hálmur; eldurin skal brenna teir; teir skulu ikki bjarga sær sjálvum frá valdi flammunnar: *har skal* ikki *vera* eitt kol til at verma *seg* hjá, *ella* eldur til at sita frammanfyri honum.

15 Svá skulu teir vera tær, við hvørjum tú hevurt strevað, *enntá* handilsmenn tínir, frá ungdómi tínum: teir skulu reika hvør *og* ēin til heraðshorn sítt; eingin skal frelsa teg.

KAPITUL 48

HOYRIÐ tit hetta, O hús Jákobs, sum eru kallaðir við navni Ísraels, og eru komnir fram út úr vøtnum Judah, sum svørja við navn HARRANS, og nevna Guð Ísraels, *men* ikki í sannleika, ella í rættvísi.

2 Tí at teir kalla seg sjálvar av hinum heilaga staði, og styðja seg sjálvar uppá Guð Ísraels; HARRI herliðanna *er* hans navn.

3 Eg havi kunngjørt hini fyrru ting frá byrjanini; og tey fóru fram út úr munni mínum, og eg sýndi tey; eg gjørdi *tey* brádliga, og tey bóru á.

4 Av tí at eg veit, at tú *ert* treiskur, og tín hálsur *er* ein jarn sina, og tín *eygna*brúgv messing;

5 Havi eg enntá frá byrjanini kunngjørt *tað* fyri tær; áður enn tað bar á sýndi eg *tað* tær: at ikki tú skuldirt siga, Mín avgudur hevur gjørt tey, og mín rista mynd, og mín brædda mynd, hevur áboðið tey.

6 Tú hevurt hoyrt, síggj alt hetta; og vilja ikki tit kunngera *tað?* eg havi sýnt tær nýggj ting frá hesi tíð, enntá fjald ting, og tú skynaðirt tey ikki.

7 Tey eru skapt nú, og ikki frá byrjanini; enntá áðrenn dagin tá ið tú hoyrdirt tey ikki; at ikki tú skuldirt siga, Sí, eg vitsti tey.

8 Ja, tú hoyrdirt ikki; ja, tú vitstirt ikki; ja, frá teirri tíð *ið* títt oyra ikki var opnað: tí at eg vitsti, at tú vildirt handla sera svikræðisliga, og varðst kallaður ein misbrótari frá móðurlívinum.

9 ¶ Fyri navns míns skuld vil eg útseta mína firtni, og fyri mína prísan vil eg afturhalda fyri teg, at eg skeri teg ikki av.

10 Sí, eg havi edlað teg, men ikki við silvuri; eg havi valt teg í bræðsluovni líðingarinnar.

11 Fyri mína egnu skyld, *enntá* fyri mína egnu skyld, vil eg gera *tað:* tí at hvussu skuldi *navn mítt* verðið óreinskað? og eg vil ikki geva mína dýrd at einum øðrum.

12 ¶ Lýð á meg, O Jákob og Ísrael, mín kallaði; eg *eri* hann; eg *eri* hin fyrsti, eg eisini *eri* hin síðsti.

13 Mín hond eisini hevur lagt grundvøll jarðarinnar, og mín høgra hond hevur spannað himnarnar: *tá ið* eg kalli á teir, standa teir upp tilsaman.

14 Allir tit, tyrpið tykkum, og hoyrið; hvør teirra millum hevur kunngjørt hesi *ting?* HARRIN hevur elskað hann: hann vil inna sína fragd á Bábylon, og hans armur *skal vera á* Chăl-dē´-unum.

15 Eg, *enntá* eg, havi talað; ja, eg havi kallað hann: eg havi ført hann, og hann skal gera veg sín framgangsríkan.

16 ¶ Komið tit nær at mær, hoyrið tit hetta; eg havi ikki talað í loyndum frá byrjanini; frá teirri tíð ið tað varð, har *eri* eg: og Harrin GUÐ, og hans Andi, hevur nú sent meg.

17 Svá sigur HARRIN, Endurloysari tín, Hin Heilagi Ísraels; Eg *eri* HARRIN tín Guð sum lærir teg at gagna, sum leiðir teg eftir veginum *sum* tú skuldirt fara.

18 O at tú hevðirt lurtað eftir boðum mínum! tá hevði friður tín verið sum ein á, og tín rættvísi sum havsins bárur:

19 Títt sáð eisini hevði verið sum sandurin, og avkomið av tínum innangoymslum líka *sum* grúsið harav; hans navn hevði ei havt verðið skorið av ella oytt frammi undan mær.

20 ¶ Farið tit fram út úr Bábylon, flýggið tit frá Chăl-dē´-unum, við eini rødd av synging kunngerið tit, sigið frá hesum, mælið tað *enntá* til enda jarðarinnar; sigið tit, HARRIN hevur endurloyst tænara sín Jákob.

21 Og teir tyrstu ikki *tá ið* hann leiddi teir ígjøgnum oyðimerkurnar: hann voldi vøtnunum at floyma út úr klettinum fyri teir: hann kleyv klettin eisini, og vøtnini gustu út.

22 *Tað finst* eingin friður, sigur HARRIN, at hinum vondu.

KAPITUL 49

LURTIÐ, O oyggjar, eftir mær; og gevið gætur, tit fólk, fjarvegis frá; HARRIN hevur kallað meg frá móðurlívinum; frá innangoymslum móður mínar hevur hann nevnt mítt navn.

2 Og hann hevur gjørt mín munn sum eitt hvast svørð; í skugganum av síni hond hevur hann fjalt meg, og gjørt meg *til* eitt pussað skaft; í sínum ørvahúsa hevur hann fjalt meg;

3 Og sagt við meg, Tú *ert* tænari mín, O Ísrael, í hvørjum eg vil verða dýrðmettur.

4 Tá segði eg, Eg havi strevað til fánýtis, eg havi brúkt mína styrki til einkiðs, og til fánýtis: *tó* vissuliga, mín dómur *er* hjá HARRANUM, og verk mítt hjá Guði mínum.

5 ¶ Og nú, sigur HARRIN sum myndaði meg frá móðurlívinum *at vera* tænara sín, at føra Jákob aftur til sín, Tó *at* Ísrael verði ikki savnaður, tó skal eg vera dýrdsamur í eygum HARRANS, og mín Guð skal vera mín styrki.

6 Og hann segði, Tað er eitt lætt*isligt* ting, at tú skuldirt vera mín tænari til at reisa upp ættir Jákobs, og til at endurbøta hinar varðveittu av Ísrael: eg vil eisini geva teg til eitt ljós til Heidningarnna, at tú mást vera mín frelsa at enda jarðarinnar.

7 Svá sigur HARRIN, Endurloysari Ísraels, *og* Hin Heilagi hans, til hansara sum maður vanvirðir, til hansara sum tjóðini stendst við, til ein tænara hjá stjórnarum, Kongar skulu síggja og reisa *seg*, prinsar eisini skulu tilbiðja, uppá grund av HARRANUM sum er trúfastur, *og* Hinum Heilaga Ísraels, og hann skal velja teg.

8 Svá sigur HARRIN, Í eini góðtakiligari tíð havi eg hoyrt teg, og í einum frelsudegi havi eg hjálpt tær: og eg vil varðveita teg, og geva teg til ein sáttmála hjá fólkinum, at grundfesta jørðina, at elva at arva hinar oydnu arvalutir;

9 At tú mást siga til fanganna, Farið fram; til teirra sum *eru* í myrkri, Sýnið tykkum. Teir skulu beitast á vegunum, og teirra beitir *skulu vera* í øllum høgum plássum.

10 Teir skulu ikki hungra ella tyrsta; eiheldur skal hitin ella sólin sláa teir: tí at hann, sum hevur miskunn á teir, skal leiða teir, enntá hjá lindunum av vatni skal hann leiða teir.

11 Og eg vil gera øll míni fjøll *til* ein veg, og mínir alfaravegir skulu verða upphevjaðir.

12 Sí, hesir skulu koma fjarvegis frá: og sí, hesir frá norðuri og frá vesturi; og hesir frá landi Sĭ-nĭm-s.

13 ¶ Syngið, O himnar; og ver frødlig, O jørð; og brótið fram yvirí synging, O fjøll: tí at HARRIN hevur uggað sítt fólk, og vil hava miskunn yvir sínar nívdu.

14 Men Zion segði, HARRIN hevur yvirgivið meg, og mín Harri hevur gloymt meg.

15 Kann ein kvinna gloyma sítt súgvandi barn, at hon skuldi ikki havt várkunn yvir son móðurlívs síns? ja, tær mega gloyma, tó vil eg ikki gloyma teg.

16 Sí, eg havi rist teg uppá lógvar handa *mína;* tínir múrar *eru* støðugt frammi fyri mær.

17 Tíni børn skulu gera skjótt; tínir oyðarar, og teir sum gjørdu teg oydna, skulu fara fram úr tær.

18 ¶ Lyft upp tíni eygu runt íkring, og sí: allir hesir savna seg saman, *og* koma til tín. *Sum* eg livi, sigur HARRIN, tú skalt vissuliga klæða teg við teim øllum, sum við einum prýðisluti, og binda tey *á teg,* eins og ein brúður *ger.*

19 Tí at tín oyðing og tíni oyðistøð, og landið av oyðing tíni, skal enntá nú vera ov smalt uppá grund av íbúgvunum, og teir sum svølgdu teg upp skulu vera langt burturi.

20 Børnini sum tú skalt hava, eftir *at* tú hevurt mist hīni, skulu siga aftur í oyru tíni, Plássið *er* ov trongt hjá mær: gev pláss til mín, at eg má dvøljast.

21 Tá skalt tú siga í hjarta tínum, Hvør hevur gitið mær hesi, við tað *at* eg havi mist míni børn, og eri ēinlig, ein fangi, og flytandi burt til og frá? og hvør hevur alið upp hesi? Sí, eg var eftirlatin aleina; hesi, hvar *høvdu* tey *verið?*

22 Svá sigur Harrin GUÐ, Sí, eg vil lyfta upp mína hond til Heidninganna, og seta upp merki mítt fyri fólkinum: og teir skulu føra tínar synir í ørmum *sínum,* og tínar døtur skulu verða bornar uppiá herðum *teirra*.

23 Og kongar skulu vera tínir fostrandi fedrar, og teirra drotningar tínar fostrandi møður: tey skulu boyggja *seg* niður fyri tær við *sínum* andliti mótvegis jørðini, og sleikja upp dust fóta tína; og tú skalt vita, at eg *eri* HARRIN: tí at teir skulu ikki verða *til* skammar sum vænta eftir mær.

24 ¶ Skal fongurin verða tikin frá tí mektiga, ella hin lógligi fangin útfríaður?

25 Men svá sigur HARRIN, Enntá fangarnir hjá tí mektiga skulu verða tiknir burtur, og fongurin hjá tí ræðuliga skal verða útfríaður: tí at eg vil stríða við hann sum stríðir við teg, og eg vil frelsa børn tíni.

26 Og eg vil føða teir, sum kúga teg, við teirra egna kjøti; og teir skulu verða druknir við teirra egna blóði, sum við søtum víni: og alt kjøt skal vita, at eg, HARRIN, *eri* Frelsari tín og Endurloysari tín, Hin mektigi Jákobs.

KAPITUL 50

SVÁ sigur HARRIN, Hvar *er* skrivið av hjúnaskilnaði móður tínar, hvørja eg havi koyrt burt? ella hvør av mínum áognarum *er tað,* til hvørs eg havi selt tykkum? Sí, fyri tykkara misgerðir hava tit selt tykkum sjálvar, og fyri tykkara misbrotˇ er móðir tykkara koyrd burt.

2 Hvørsvegna, tá ið eg kom, *var* eingin maður? tá ið eg kallaði, *var* eingin at svara? Er hond mín stytt yvirhøvur, at hon kann ikki endurloysa? ella havi eg ongan mátt til at bjarga? sí, við mína hartan turki eg upp sjógvin, eg geri áirnar *til* eina oyðu: teirra fiskur stinkar, av tí at einkið vatn *er,* og doyr vegna torsta.

3 Eg klæði himnarnar við sorta, og eg geri sekkjaklæði *til* teirra dekking.

4 Harrin GUÐ hevur givið mær tungu teirra lærdu, at eg skuldi duga at tala eitt orð í tíð til *hansara sum er* útlúgvaður: hann vekir morgun eftir morgun, hann vekir mítt oyra til at hoyra eins og teir lærdu.

5 ¶ Harrin GUÐ hevur opnað mítt oyra, og eg var ikki mótræsin, eiheldur vendi avstað tilbakar.

6 Eg gav bak mítt til sláararnar, og mínar kinnar til teirra sum slitu av hárið: eg fjaldi ikki mítt andlit frá skomm og spíting.

7 ¶ Tí at Harrin GUÐ vil hjálpa mær; tí skal eg ikki verða ørkymlaður: tí at havi eg sett mítt andlit sum ein tinnustein, og eg veit at eg skal ikki verða *til* skammar.

8 *Hann er* nær sum rættvísger meg; hvør vil træta við meg? lat okkum standa tilsaman: hvør *er* mótstandari mín? lat hann koma nær til mín.

9 Sí, Harrin GUÐ vil hjálpa mær; hvør *er* hann *sum* skal fordøma meg? sí, teir allir skulu

gerast gamlir sum eitt klæði; mølurin skal eta teir upp.

10 ¶ Hvør *er* tykkara millum sum óttast HARRAN, sum aktar rødd tænara hans, sum gongur *í* myrkri, og einkið ljós hevur? lat hann troysta á navn HARRANS, og styðjast uppá Guð sín.

11 Sí, allir tit sum kynda ein eld, sum umringa *tykkum sjálvar* umkring við neistum: gangið í ljósinum av tykkara eldi, og í neistunum *sum* tit hava kynt. Hetta skulu tit hava av hond míni; tit skulu leggjast niður í sorg.

KAPITUL 51

LÝÐIÐ á meg, tit sum fylgja eftir rættvísi, tit sum søkja HARRAN: lítið at klettinum, *hvaðan* tit eru høgdir; og til holuna av gryvjuni, *hvaðan* tit eru grivnir.

2 Lítið at Ábrahami faðir tykkara, og at Sáruh *sum* føddi tykkum: tí at eg kallaði hann aleina, og vælsignaði hann, og økti um hann.

3 Tí at HARRIN skal ugga Zion: hann vil ugga øll hennara oydnu støð; og hann vil gera hennara reyn líkasum Eden, og hennara oyðimørk líkasum urtagarð HARRANS; frøi og gleði skulu verða funnin harí, takkarveitan, og røddin á melodíi.

4 ¶ Lýðið á meg, fólk mítt; og lænið oyra at mær, O tjóð mín: tí at ein lóg skal útganga frá mær, og eg vil fáa dóm mín at hvíla til eitt ljós hjá fólkinum.

5 Mín rættvísi *er* nær; mín frelsa er farin fram, og mínir armar skulu døma fólkið; oyggjarnar skulu bíða eftir mær, og á mín arm skulu tær líta.

6 Lyftið upp eygum tykkara til himnanna, og hyggið uppá jørðina niðanfyri: tí at himnarnir skulu hvørva burt líka *sum* roykur, og jørðin skal gerast gomul eins og eitt klæði; og teir, sum búgva hará, skulu doyggja á líkan hátt: men mín frelsa skal vera um ævir, og mín rættvísi skal ei verða avtikin.

7 ¶ Lýðið á meg, tit ið kenna rættvísi, fólkið, í hvørs hjarta *er* mín lóg; óttist tit ikki spottið av monnum, eiheldur verið tit ræddir fyri teirra útskeldingum.

8 Tí at mølurin skal eta teir upp sum eitt klæði, og ormurin skal eta teir sum ull: men mín rættvísi skal verða um ævir, og mín frelsa frá ætt til ætt.

9 ¶ Vakna, vakna, far í styrki, O armur HARRANS; vakna, sum í fyrndardøgunum, í ættarliðunum í forðum. *Ert* tú ikki hann sum hevur høgt Ráhab, *og* sært drekan?

10 *Ert* tú ikki hann sum hevur turkað sjógvin, vøtn hins mikla djúps; sum hevur gjørt dýpdir havsins *til* ein veg hjá hinum loysigoldnu at fara yvirum?

11 Tí skulu teir endurloystu HARRANS venda aftur, og koma við synging at Zion; og ævigtvarandi frøi *skal vera* uppiá teirra høvdi: teir skulu lutast gleði og frøi; *og* sorg og harman skulu flýggja burt.

12 Eg, *enntá* eg, *eri* hann sum uggar tykkum: hvør *ert* tú, at tú skuldirt verið ræddur fyri einum manni *sum* skal doyggja, og fyri manssyninum *sum* skal verða gjørdur *sum* gras;

13 Og gloymirt HARRAN tín skapara, sum hevur tant út himnarnar, og lagt grundvøllir jarðarinnar; og hevurt óttast áframhaldandi hvønn dag orsakað av øði kúgarans, sum um hann var tilreiðar at oyða? og hvar *er* øði kúgarans?

14 Hin fangaði útlegdarmaður skundar, at hann má verða loystur, og at hann ei skuldi doyð í

holuni, ella at hansara breyð skuldi svitast.

15 Men eg *eri* HARRIN Guð tín, sum atskildi sjógvin, hvørs aldur ýldu: HARRI herliðanna *er* hans navn.

16 Og eg havi lagt míni orð í tín munn, og eg havi dekkað teg í skugganum av míni hond, at eg má planta himnarnar, og leggja grundvøllir jarðarinnar, og siga við Zion, Tú *ert* fólk mítt.

17 ¶ Vakna, vakna, statt upp, O Jerusalem, sum hevurt drukkið av HARRANS hond bikarið av hans øði; tú hevurt drukkið gruggini úr nøtranar-bikarinum, *og* vundið *tey* út.

18 *Tað er* eingin at vegleiða hana millum allar hennara synir *sum* hon hevur borið fram; eiheldur *er tað nakar* sum tekur í hondina á henni av øllum sonunum *sum* hon hevur alt upp.

19 Hesi tvey *ting* eru komin at tær; hvør skal taka synd í tær? avtoftan, og oyðing, og hungursneyðin, og svørðið: við hvørjum skal eg ugga teg?

20 Tínir synir eru ørmaktaðir, teir liggja við mótið á øllum gøtunum, sum ein villur tarvur í eini nót: teir eru fullir av øði HARRANS, hartan Guðs tíns.

21 ¶ Tessvegna hoyr nú hetta, tú nívda, og drukna, men ikki við víni:

22 Svá sigur tín Harri HARRIN, og tín Guð *sum* førir søkina hjá fólki sínum, Sí, eg havi tikið út úr hond tíni nøtranar-bikarið, *enntá* gruggini av bikarinum av míni øði; tú skalt ei meira drekka tað aftur:

23 Men eg vil koyra tað í hondina á teimum sum níva teg; sum hava sagt til sál tína, Boygg *teg* niður, at vit mega fara yvirum: og tú hevurt lagt títt likam sum jørðina, og sum gøtuna, fyri teimum sum fóru yvirum.

KAPITUL 52

VAKNA, vakna; far í tína styrki, O Zion; far í tíni føgru klæðir; O Jerusalem, hin heilagi staður: tí at hiðanífrá skal tað ei meira koma inn í teg hin óumskorni og hin óreini.

2 Rist teg sjálva frá støvinum; reis *teg, og* setst niður, O Jerusalem: loys teg sjálva frá bondum nakka tíns, O hertikna dóttir Zions.

3 Tí at svá sigur HARRIN, Tit hava selt tykkum sjálvar fyri einkið; og tit skulu verða endurloystir uttan pening.

4 Tí at svá sigur Harrin GUÐ, Mítt fólk fór niður í farnari tíð inn í Egyptaland at útisita har; og Assýriarin kúgaði teir uttan grund.

5 Nú tessvegna, hvat havi eg her, sigur HARRIN, at fólk mítt er tikið burt fyri einkið? teir, sum stjórna yvir teimum, fáa teir at skrenja, sigur HARRIN; og navn mítt støðugt hvønn dag *verður* Guðsspottað.

6 Tí skal fólk mítt kenna navn mítt: tí *skulu teir vita* á tí degi, at eg *eri* hann ið talar: sí, *tað eri* eg.

7 ¶ Hvør fagrir uppiá fjøllunum eru føturnir hjá honum sum ber góð tíðindir, sum kunnger frið; sum ber góð tíðindir um gott, sum kunnger frelsu; sum sigur við Zion, Guð tín ríkir!

8 Tínir varðmenn skulu hevja upp røddina; við røddini saman skulu teir syngja: tí at teir skulu síggja eyga til eyga, tá ið HARRIN skal føra aftur Zion.

9 ¶ Brótið fram yvirí frøi, syngið saman, tit oydnu plóss Jerusalems: tí at HARRIN hevur uggað sítt fólk, hann hevur endurloyst Jerusalem.

10 HARRIN hevur gjørt beran sín heilaga arm í eygunum á

øllum tjóðunum; og allir endar jarðarinnar skulu síggja frelsu Guðs várs.

11 ¶ Farið tit avstað, farið tit avstað, farið tit út haðani frá, nemið einkið óreint *ting;* farið tit út úr hennara miðju; verið tit reinir, sum bera kerˇ HARRANS.

12 Tí at tit skulu ikki fara út við skundi, ella fara við flýggjan: tí at HARRIN vil fara undan tykkum; og Guð Ísraels *vil vera* tykkara bakvørður.

13 ¶ Sí, tænari mín skal bera *seg* hyggjuliga at, hann skal verða upphevjaður og hálovaður, og vera sera høgur.

14 Eins og mangir vórðu øtaðir yvir teg; hans ásjón var so skemmað, meiri enn nakar maður, og hansara skap meiri enn synir manna:

15 Soleiðis skal hann ásletta mangar tjóðir; kongarnir skulu loka sínum munnum fyri honum: tí at *tað,* sum ei hevði verðið sagt teimum, skulu teir síggja; og *tað,* sum teir ei høvdu hoyrt, skulu teir umhugsa.

KAPITUL 53

HVØR hevur trúð fráboðan vári? og fyri hvørjum er armur HARRANS opinberaður?

2 Tí at hann skal vaksa upp frammi fyri honum sum ein viðkvom planta, og sum ein rót úr turrari jørð: hann hevur einkið skap ella yndisligsemi; og tá ið vit skulu síggja hann, *er* eingin vakurleiki, at vit skuldu tráað hann.

3 Hann er vanvirdur og havnaður av monnum; ein maður av sorgum, og kunnigur við harm: og vit fjaldu sum var tað *okkara* andlitˇ frá honum; hann var vanvirdur, og vit virdu hann ikki.

4 ¶ Vissuliga, hann hevur borið okkara harmir, og borið okkara sorgir: vit tó mettu hann bardan, slignan av Guði, og nívdan.

5 Men hann *varð* særdur fyri okkara misbrotˇ, *hann varð* knústur fyri okkara misgerðir: agingin til okkara frið *var* uppiá honum; og við hansara fleingjum vit eru grøddir.

6 Allir vit sum seyðir eru farnir til stroks; vit hava vent hvør *og* ēin til sín egna veg; og HARRIN hevur lagt á hann misgerðina hjá okkum øllum.

7 Hann varð kúgaður, og hann varð nívdur, hann tó læt ikki upp munn sín: hann er førdur sum eitt lamb til slátringina, og eins og ein seyður frammi fyri klippararum sínum er málleysur, soleiðis hann opnar ikki sín munn.

8 Hann varð tikin frá fongsli og frá dómi: og hvør skal kunngera ætt hans? tí at hann varð skorin av úr landi teirra livandi: fyri brot fólks míns varð hann sligin.

9 Og hann reiddi sína grøv við teimum vondu, og við tí ríka í deyða sínum; tí at hann hevði ongan harðskap gjørt, eiheldur *var nakað* svik í hansara munni.

10 ¶ Tó toknaði tað HARRANUM at knúsa hann; hann hevur sett *hann* til harm: tá ið tú skalt gera hansara sál *til* eitt offur fyri synd, skal hann síggja sáð *sitt,* hann skal framleingja *hansara* dagar, og HARRANS fragd skal framganga í hond hansara.

11 Hann skal síggja av strevinum hjá síni sál, *og* skal verða mettaður: við sínum kunnleika skal mín rættvísi tænari rættvísgera mangar; tí at hann skal bera teirra misgerðir.

12 Tí vil eg skifta honum *ein skamt* við hinum miklu, og hann skal skifta herfongin við hinum sterku; av tí at hann hevur helt út sína sál at deyða: og hann varð upptaldur við brotsmonnunum; og hann bar syndina hjá mongum, og gekk í forbøn fyri brotsmonnunum.

KAPITUL 54

SYNG, O óburna, tú *sum* føddirt ei; brót fram yvirí synging, og rópa hart, tú *sum* ei hevðirt verkir við barni: tí at fleiri *eru* børnini hjá hini ēinligu, enn børnini hjá hini giftu konu, sigur HARRIN.

2 Vaks um plass tjalds tíns, og lat teir tenja fram dúkar bústaða tína: spar ikki, long um snórar tínar, og styrk um stengur tínar;

3 Tí at tú skalt bróta fram til hinnar høgru handar og til hinnar vinstru; og sáð títt skal arva Heidningarnar, og fáa hinar oydnu staðir at verða búnar í.

4 Óttast ikki; tí at tú skalt ikki skammast: eiheldur vert tú fjamskað; tí at tú skalt ikki verða gjørd til skammar: tí at tú skalt gloyma skomm ungdóms tíns, og skalt ikki minnast til skemd einkjudóms tíns meira.

5 Tí at Skapari tín *er* ektamaður tín; HARRI herliðanna *er* hans navn; og tín Endurloysari Hin Heilagi Ísraels; Guð alrar jarðarinnar skal hann verða kallaður.

6 Tí at HARRIN hevur kallað teg sum eina kvinnu — yvirgivin og hørm í anda, og eitt ungdóms vív, tá ið tú vart havnað, sigur Guð tín.

7 Tí eitt lítið bil havi eg yvirgivið teg; men við miklum miskunnum vil eg savna teg.

8 Í eini lítlari vreiði fjaldi eg mítt andlit fyri tær í eitt bil; men við ævigtvarandi blíðni vil eg hava miskunn yvir teg, sigur HARRIN tín Endurloysari.

9 Tí at hetta *er eins og* vøtn Nóah yvirfyri mær: tí at *eins og* eg havi svorið, at Nóah vøtn skuldu ei meira fara yvir jørðina; soleiðis havi eg svorið, at eg vildi ei vera vreiður við teg, ella harta teg.

10 Tí at fjøllini skulu víkja, og heyggjarnir verða firraðir; men mín blíðni skal ikki víkja frá tær, eiheldur skal sáttmálin av mínum friði verða firraður, sigur HARRIN, sum hevur miskunn yvir teg.

11 ¶ O tú nívda, syfta við ódnarvindi, *og* ikki uggað, sí, eg vil leggja tínar steinar við føgrum litum, og leggja tínar grundvøllir við sapphīrum.

12 Og eg vil gera tínar gluggar av agātum, og tíni portur av karfunklum, og øll tíni mørk av dámligum steinum.

13 Og øll tíni børn *skulu verða* lærd av HARRANUM; og mikil *skal vera* friðurin hjá børnum tínum.

14 Í rættvísi skalt tú verða grundfest: tú skalt vera fjart frá kúgan; tí at tú skalt ikki óttast: og frá ræðslu; tí at hon skal ikki koma nær tær.

15 Sí, teir skulu vissuliga savnast saman, *men* ikki av mær: hvørsumhelst *ið* skal savnast saman ímóti tær, skal falla fyri tína skyld.

16 Sí, eg havi skapt smiðin sum blæsur kolini í eldinum, og sum førir fram eitt amboð til arbeið sítt; og eg havi skapt oyðaran at oyða.

17 ¶ Einkið vápn, sum myndað verður ímóti tær, skal blóma; og hvørja tungu, *sum* skal rísa ímóti tær í dómi, skalt tú dómfella. Hetta *er* arvalutur tænara HARRANS, og teirra rættvísi *er* av mær, sigur HARRIN.

KAPITUL 55

HEY, hvør tann sum tyrstir, komið tit til vøtnini, og hann sum ongan pening hevur; komið tit, keypið, og etið; ja, komið, keypið vín og mjólk uttan pening og uttan prís.

2 Hvørsvegna brúka tit pening fyri *hatta sum er* ikki breyð? og tykkara strev fyri *hatta sum* mettar ikki? lýðið dúgligani á meg, og

etið tit *tað sum er* gott, og latið tykkara sál fragda sær í fiti.

3 Bendið oyra tykkara, og komið at mær: hoyrið, og tykkara sál skal liva; og eg vil gera ein ævigtvarandi sáttmála við tykkum, *enntá* hinar vissu miskunnir Dávids.

4 Sí, eg havi givið hann *til* eitt vitni til fólksins, ein leiðara og *ein* yvirmann til fólksins.

5 Sí, tú skalt rópa eina tjóð *sum* tú ikki kennirt, og tjóðir *sum* kendu ikki teg skulu renna at tær, uppá grund av HARRANUM Guði tínum, og vegna Hin Heilaga Ísraels; tí at hann hevur dýrðmett teg.

6 ¶ Søkið tit HARRAN, meðan hann kann verða funnin; kallið tit uppá hann, meðan hann er nær:

7 Lat hin vonda yvirgeva sín veg, og hin órættvísa mann sínar hugsanir: og lat hann venda aftur at HARRANUM, og hann vil hava miskunn yvir hann; og til Guðs várs, tí at hann vil ríkiliga náða.

8 ¶ Tí at mínar hugsanir *eru* ikki tykkara hugsanir, eiheldur *eru* tykkara vegir mínir vegir, sigur HARRIN.

9 Tí at *eins og* himnarnir eru hægri enn jørðin, soleiðis eru mínir vegir hægri enn tykkara vegir, og mínar hugsanir enn tykkara hugsanir.

10 Tí at eins og regnið kemur niður, og kavin frá himni, og vendir ikki aftur hagar, men vatnar jørðina, og fær hana *at* bera fram og spíra, at hon má geva sáð til sáaran, og breyð til etaran:

11 Soleiðis skal orð mítt vera sum gongur fram út úr munni mínum: tað skal ikki venda aftur til mín tómt, men tað skal fullføra tað sum mær toknar, og tað skal framganga *í tí lutt,* hvartil eg sendi tað.

12 Tí at tit skulu fara út við frøi, og verða leiddir fram við friði: fjøllini og heyggjarnir skulu bróta fram frammi fyri tykkum yvirí synging, og øll akursins trø skulu klappa hendur *sínar.*

13 Ístaðin fyri tornina skal koma upp aðalgranntræið, og ístaðin fyri tistilin skal koma upp myrtutræið: og tað skal vera fyri HARRAN til eitt navn, til eitt ævigtvarandi tekin, *sum* skal ikki verða skorið av.

KAPITUL 56

SVÁ sigur HARRIN, Varðveitið tit dóm, og innið rættlæti: tí at mín frelsa *er* nær *við* at koma, og mín rættvísi *við* at verða opinberað.

2 Signaður *er* tann maður *sum* hetta ger, og menniskjusonurin *sum* leggur hald á tað; sum heldur sabbatin frá at óreinka hann, og heldur sína hond frá at gera nakað ilt.

3 ¶ Eiheldur lat sonin hjá tí fremmanda, sum hevur sameinað seg til HARRANS, tala, sigandi, HARRIN hevur aldeilis atskilt meg frá fólki sínum: eiheldur lat geldingan siga, Sí, eg *eri* eitt turt træ.

4 Tí at svá sigur HARRIN við geldingarnar sum halda sabbatar mínar, og velja *tey tingini* sum tókna mær, og taka hald á sáttmála mínum;

5 Enntá teimum vil eg geva í húsi mínum og innanfyri múrar mínar eitt pláss og eitt navn, betri enn hjá sonum og døtrum: eg vil geva teimum eitt ævigtvarandi navn, sum skal ikki verða skorið av.

6 Eisini synir hins fremmanda, sum sameina seg til HARRANS, at tæna honum, og at elska navn HARRANS, at vera tænarar hansara, hvør tann sum heldur sabbatin frá at óreinka hann, og tekur hald á sáttmála mínum;

7 Enntá teir vil eg føra til heilaga fjalls míns, og gera teir frødligar í bønhúsi mínum: teirra

brennioffurˇ og teirra sláturoffurˇ *skulu verða* góðtikin uppiá altari mínum; tí at hús mítt skal verða kallað eitt bønhús fyri alt fólk.

8 Harrin GUÐ, sum savnar Ísraels útstoyttu, sigur, Enn vil eg savna *aðrar* til hansara, umframt teir sum eru savnaðir at honum.

9 ¶ Øll tit akursins villdjór, komið at uppslúka, *ja,* øll tit villdjór í skóginum.

10 Hans vaktarmenn *eru* blindir: teir eru allir óvitandi, teir *eru* allir málleysir hundar, teir duga ikki *at* goyggja; sovandi, liggjandi niðri, elskandi at dúra.

11 Ja, *teir eru* grádigir hundar *sum* kunnu aldri hava nóg mikið, og teir *eru* hirðar *sum* duga ikki *at* skilja: teir allir hyggja til sín egna veg, hvør *og* ēin fyri vinning sín, frá sínum heraðshorni.

12 Komið tit, *siga teir,* Eg vil heinta vín, og vit vilja fylla okkum við sterkum drykki; og í morgin skal verða sum hesin dagurin, *og* nógv meira ríkiligur.

KAPITUL 57

HIN rættvísi ferst, og eingin maður leggur *tað* á hjarta: og miskunnarfullir menn *eru* tiknir burt; eingin umhugsandi, at hin rættvísi er tikin burt frá tí ónda *sum koma skal.*

2 Hann skal innfara inn í frið: teir skulu hvíla á legum sínum, *hvør og ēin* gangandi *í* síni reiðiligsemi.

3 ¶ Men nærkist higar, tit synir hjá galdrakvinnuni, sáðið hjá horkallinum og skøkjuni.

4 Ímóti hvørjum stuttleika tit tykkum? ímóti hvørjum gera tit víðan munn, *og* rætta út tunguna? *eru* tit ikki misbrots børn, eitt falssemis sáð,

5 Uppflammandi tykkum sjálvar við avgudum undir hvørjum grønum træi, banandi børnunum í dølunum undir klivum klettanna?

6 Millum hinna gløttu *steina* streymsins *er* skamtur tín; teir, teir *eru* lutur tín: enntá til teirra hevurt tú helt eitt drykkoffur, tú hevurt ofrað eitt matoffur. Skuldi eg tikið við uggan í hesum?

7 Uppiá einum loftigum og høgum fjalli hevurt tú sett tína song: enntá hagar fórst tú niðan at ofra sláturoffur.

8 Aftanfyri hurðarnar eisini og durastavirnar hevurt tú sett upp títt endurminni: tí at tú hevurt avdekkað *teg sjálva fyri einum øðrum* enn mær, og ert farin upp*í;* tú hevurt vaksið um song tína, og gjørt tær *ein sáttmála* við teir; tú elskaðirt song teirra, har tú sást *hana.*

9 Og tú fórt til kongsins við salvu, og øktirt um tíni angilsir, og sendirt tínar sendiboðar langt burtur, og mannminkaðirt *teg sjálva alt* at helviti.

10 Tú ert mødd í mikilleika vegar tíns; *tó* segðirt tú ikki, Tað er eingin vón: tú hevurt funnið lív handar tínar; tí varðst tú ikki hørm.

11 Og fyri hvørjum hevurt tú verið rædd ella óttast, at tú hevurt logið, og hevurt ikki minst til mín, ella lagt *tað* á hjarta títt? havi ikki eg hildið friði mínum heilt frá gomlum *av,* og tú óttarst meg ei?

12 Eg vil kunngera tína rættvísi, og tíni verk; tí at tey skulu ikki gagna tær.

13 ¶ Tá ið tú rópart, lat tínar flokkar bjarga tær; men vindurin skal bera teir allar burt; fáfongd skal taka *teir:* men hann, sum setur sítt álit á meg, skal ognast landið, og skal arva mítt heilaga fjall;

14 Og skal siga, Laðið tit upp, laðið tit upp, fyrireikið vegin, takið upp snávingarsteinin út av vegi fólks míns.

15 Tí at svá sigur Hin høgi og loftigi, sum íbýr ævinleika, hvørs navn *er* Heilagur; Eg búgvi í hinum høga og heilaga *plássinum*, hjá honum eisini *sum er* av einum knústum og eyðmjúkum anda, at endurlívga anda teirra eyðmjúku, og at endurlívga hjarta teirra knústu.

16 Tí at eg vil ikki stríða um ævir, eiheldur vil eg altíð vera vreiður: tí at andin hevði givið *seg* frammi fyri mær, og sálirnar *sum* eg havi gjørt.

17 Fyri misgerðina av hansara havisjúku var eg vreiður, og sló hann: eg fjaldi meg, og var vreiður, og hann fór áfram rangvørgiligani í vegi hjarta síns.

18 Eg havi sæð hansara vegir, og vil grøða hann: eg vil leiða hann eisini, og endurbøta ugganir at honum og til hansara syrgjarar.

19 Eg skapi ávøkst varranna; Friður, friður til *hansara sum er* langt burturi, og til *hansara sum er* nær, sigur HARRIN; og eg vil grøða hann.

20 Men hinir vondu *eru* eins og hin órógvaði sjógvur, tá ið hann fær ikki hvílt, hvørs vøtn kasta upp móru og runu.

21 *Tað finst* eingin friður, sigur Guð mín, til hinar vondu.

KAPITUL 58

GEYLA hart, spar ikki, lyft upp tína rødd sum ein lúður, og sýn mínum fólki teirra brot, og Jákobs húsi teirra syndir.

2 Tó søkja teir meg dagliga, og fragdast *í* at kenna mínar vegir, sum ein tjóð sum gjørdi rættvísi, og yvirgav ikki regluskipan Guðs síns: teir umbiðja av mær regluskipanir rættlætisins; teir hava fragd í at nærkast til Guðs.

3 ¶ Hví hava vit fastað, *siga teir*, og tú sært ikki? *hví* hava vit nívt vára sál, og tú bert ikki kennskap *við tað?* Sí, í deginum av tykkara føstu finna tit njóting, og noyða øll tykkara strev.

4 Sí, tit fasta fyri klandur og kjak, og til at sláa við vondskunnar neva: tit skulu ikki fasta sum *tit gera henda* dag, at fáa tykkara rødd at verða hoyrda á hædd*ini*.

5 Er tað ein slík føsta sum eg havi valt? ein dagur hjá einum manni at níva sína sál? *er tað* at boyggja niður sítt høvur sum ein sevstav, og at breiða sekkjaklæði og øskur *undir seg?* vilt tú kalla hetta eina føstu, og ein góðtakiligan dag fyri HARRANUM?

6 *Er* ikki hetta føstan sum eg havi valt? at loysa vondskunnar bond, at órina hinar tungu byrðar, og at lata hinar kúgaðu fara fríar, og at tit bróti hvørt *eitt* ok?

7 *Er tað* ikki at býta títt breyð til tey svongu; og at tú føri hinar fátæku, sum eru kastaðir út, til hús títt? tá ið tú sært hin nakna, at tú dekki hann; og at tú fjali ikki teg sjálvan fyri egna kjøti tínum?

8 ¶ Tá skal títt ljós bróta fram sum morgunin, og tín heilsa skal spretta fram skundisliga: og tín rættvísi skal fara undan tær; dýrd HARRANS skal vera tín bakvørður.

9 Tá skalt tú kalla, og HARRIN skal svara; tú skalt rópa, og hann skal siga, Her eg *eri*. Um tú taki burt frá miðjum tær okið, koyringina fram av fingrinum, og at tala fáfongd;

10 Og *um* tú dragi út tína sál til hin svanga, og metti ta nívdu sál; tá skal títt ljós rísa í niðu, og títt myrkur *vera* sum miðdagurin:

11 Og HARRIN skal leiðbeina tær støðugt, og metta tína sál í turki, og gera feit tíni bein: og tú skalt vera líka *sum* ein vatnaður urtagarður, og líka *sum* ein lind av vatni, hvørs vøtn svitast ei.

12 Og *teir, sum skulu verða* av tær, skulu byggja hini gomlu oyðistøð: tú skalt reisa upp grundvøllin hjá mongum ættarliðum; og tú skalt verða kallaður, Umvælarin av rivuni, Endurbøtarin av rásum at búgva í.

13 ¶ Um tú vendi burt tínum fóti frá sabbatinum, *frá* at inna tín gleim á mínum heilaga degi; og kalli sabbatin eina fragd, HARRANS heilaga, heiðursaman; og skalt heiðra hann, ei gerandi tínar egnu vegir, ella finnandi tín egna gleim, ella talandi *tíni egnu* orð:

14 Tá skalt tú fragda tær í HARRANUM; og eg vil elva tær at ríða uppiá hinum høgu plássum jarðarinnar, og mata teg við arvaluti Jákobs, faðirs tíns: tí at muður HARRANS hevur talað *tað*.

KAPITUL 59

SÍ, HARRANS hond er ikki stytt, at hon kann ikki frelsa; eiheldur oyra hansara tungt, at tað kann ikki hoyra:

2 Men tykkara misgerðir hava atskilt ímillum tykkum og Guð tykkara, og tykkara syndir hava fjalt *hans* andlit fyri tykkum, at hann vil ikki hoyra.

3 Tí at tykkara hendur eru dálkaðar við blóði, og tykkara fingrar við misgerð; tykkara varrar hava talað lygnir, tykkara tunga hevur mutlað spillusemi.

4 Eingin kallar eftir rættvísi, ella *nakar* førir søk fyri sannleika: teir líta á fáfongd, og tala lygnir; teir ala fram skaða, og bera fram misgerð.

5 Teir klekja basiliska eggˇ, og veva eiturkoppsins vev: hann, ið etur av teirra eggum, doyr; og tað, sum verður knúst, brýtur út í ein eiturorm.

6 Teirra vev skulu ikki verða *til* klæðir, eiheldur skulu teir dekka seg við sínum verkum: teirra verk *eru* misgerðar-verk, og harðskaparins gerningur *er* í teirra hondum.

7 Teirra føtur renna til ilt, og teir gera skjótt at úthella sakleyst blóð: teirra hugsanir *eru* misgerðar-hugsanir; avtoftan og oyðilegging *eru* á teirra leiðum.

8 Friðar-vegin teir kenna ikki; og *tað er* eingin dómur í teirra gongdum: teir hava gjørt sær krókutar leiðir: hvørsumhelst *ið* gongur hará skal ei kenna frið.

9 ¶ Tí er dómur fjart frá okkum, eiheldur innheintar rættlæti okkum: vit bíða eftir ljósi, men sí dimmsemi; eftir bjartleika, *men* vit ganga í myrkri.

10 Vit trilva eftir vegginum sum hinir blindu, og vit trilva sum um *vit* eingi eygu *høvdu:* vit snáva á middegi sum um náttina; *vit eru* á oyðistøðum sum deyðir *menn*.

11 Vit ýla allir líka *sum* birnir, og harma sáran líka *sum* dúgvur: vit vænta eftir dómi, men eingin *er;* eftir frelsu, *men* hon er langt burturi frá okkum.

12 Tí at okkara misbrot eru margfaldað frammi fyri tær, og okkara syndir vitna ímóti okkum: tí at okkara misbrot *eru* hjá okkum; og *hvat* okkara misgerðum *viðvíkur,* vit kenna tær;

13 Í at misbróta og at lúgva ímóti HARRANUM, og at víkja burtur frá Guði várum, talandi kúgan og uppreist, alandi fram og mælandi frá hjartanum falssemis orðˇ.

14 Og dómur er vendur burt afturá, og rættlæti stendur langt burturifrá: tí at sannleiki er fallin í gøtuni, og rættferð kann ikki innfara.

15 Ja, sannleiki bilar; og hann, *ið* víkur frá illum, ger seg sjálvan *til* ein fong: og HARRIN sá *tað,* og tað mistoknaði honum at eingin dómur *var*.

16 ¶ Og hann sá, at eingin maður *var,* og undraðist *á,* at eingin forbiðjari *var:* tí bar hans armur honum frelsu; og hansara rættvísi, hon uppihelt honum.

17 Tí at hann læt *seg* í rættvísi sum eina bróstbrynju, og ein frelsu-hjálm uppá høvur sítt; og hann fór í hevndarklæðini *til* klædnað, og var klæddur við vandlæti sum eina kápu.

18 Samsvarandi við *teirra* gerðir, sambærligani vil hann endurgjalda, øði til mótstandara sína, endurgjald til fígginda sína; til oyggjanna vil hann endurgjalda endurgjald.

19 So skulu teir óttast navn HARRANS úr vestri, og hansara dýrd frá sólarrisinum. Tá ið fíggindin skal koma inn sum ein flóð, skal Andi HARRANS lyfta upp eitt hermerki ímóti honum.

20 ¶ Og Endurloysarin skal koma til Zion, og innat teim sum venda frá misbroti í Jákobi, sigur HARRIN.

21 Hvat viðvíkur mær, hesin *er* sáttmáli mín við teir, sigur HARRIN; Mín andi sum *er* uppiá tær, og míni orð sum eg havi lagt í tín munn, skulu ikki víkja út úr munni tínum, ella út úr munni sáðs tíns, ella út úr munninum á sáði sáðs tíns, sigur HARRIN, hiðanífrá og um ævir.

KAPITUL 60

REIS *teg,* skín; tí at ljós títt er komið, og dýrd HARRANS er risin uppiá tær.

2 Tí at sí, myrkrið skal hylja jørðina, og tjúkt myrkur fólkið: men HARRIN skal reisast uppiá tær, og hansara dýrd skal verða sædd uppiá tær.

3 Og Heidningarnir skulu koma til ljós títt, og kongar til bjartleikan av tíni rísing.

4 Lyft upp tínum eygum runt umkring, og síggj: allir teir savna seg saman, teir koma til tín: tínir synir skulu koma fjar*vegis* frá, og tínar døtur skulu verða fostraðar við *tína* lið.

5 Tá skalt tú síggja, og fløða tilsaman, og títt hjarta skal óttast, og verða vaksið um; av tí at havsins ríkiligsemi skal verða umvend til tín, kreftur Heidninganna skulu koma at tær.

6 Fjøldin av kamelum skal dekka teg, dromedárarnir úr Mĭ-dĭ-ăn og Ē-phâh; allir teir frá Sjē-bă skulu koma: teir skulu føra gull og roykilsi; og teir skulu sýna fram *lov*prísing*ar* HARRANS.

7 Øll fylgini úr Kē-dăr skulu verða savnaði saman at tær, Nē-bâi-ōth-s veðrar skulu tæna at tær: teir skulu koma niðan við góðtakiligsemi á mítt altar, og eg vil dýrðmeta hús dýrdar mínar.

8 Hvørjir *eru* hesir *sum* flúgva sum eitt skýggj, og eins og dúgvurnar til glugga sína?

9 Vissuliga skulu oyggjarnar vænta eftir mær, og skipini úr Tarsjisj fyrst, at føra tínar synir fjar*vegis* frá, sítt silvur og sítt gull við sær, at navni HARRANS Guðs tíns, og til Hins Heilaga Ísraels, av tí at hann hevur dýrðmett teg.

10 Og synirnir hjá fremmandum skulu byggja upp múrar tínar, og teirra kongar skulu tæna at tær: tí at í míni vreiði sló eg teg, men í mínum tokka havi eg havt miskunn á teg.

11 Tí skulu tíni portur vera opin áframhaldandi; tey skulu ikki verða lokað dag ella nátt; at *menn* mega føra at tær kreftur Heidninganna, og *at* teirra kongar *mega verða* førdir.

12 Tí at tann tjóð og tað kongadømi, sum vil ikki tæna tær, skal farast; ja, *tær* tjóðir skulu fullkomiliga verða oyddar.

13 Lĭ-bă-nōn-s dýrd skal koma at tær, aðalgranntræið, furutræið, og buks*træið* tilsaman, at fríðka

um plass halgidóms míns; og eg vil gera plass fóta mína dýrdsamt.

14 Synirnir eisini hjá teimum, ið nívdu teg, skulu koma boyggjandi at tær; og allir teir, sum vanvirdu teg, skulu boyggja seg niður við iljar fóta tína; og teir skulu kalla teg, Staður HARRANS, Zion Hins Heilaga Ísraels.

15 Hvar ið tú hevurt verið yvirgivin og hatað, so at eingin maður fór igjøgnum *teg,* vil eg gera teg *til* eina æviga avbærni, eina frøi hjá mongum ættarliðum.

16 Tú skalt eisini súgva mjólkina hjá Heidningunum, og skalt súgva bróstið hjá kongum: og tú skalt vita, at eg, HARRIN, *eri* Frelsari tín og Endurloysari tín, Hin mektigi Jákobs.

17 Fyri messing vil eg føra gull, og fyri jarn vil eg føra silvur, og fyri við messing, og fyri steinar jarn: eg vil eisini gera tínar yvirmenn *til* frið, og tínar innkrevjarar *til* rættvísi.

18 Harðskapur skal ei meira verða hoyrdur í landi tínum, toftan ella oyðing innan marka tína; men tú skalt kalla tínar múrar Frelsa, og tíni portur Lov.

19 Sólin skal ei meira vera ljós títt á degi; eiheldur til bjartleika skal mánin geva tær ljós: men HARRIN skal vera tær ævigtvarandi ljós, og tín Guð tín dýrd.

20 Tín sól skal ei meira fara niður; eiheldur skal máni tín hava seg undan: tí at HARRIN skal vera títt ævigtvarandi ljós, og dagarnir av tíni harman skulu vera endaðir.

21 Títt fólk eisini *skulu vera* øll rættvís: tey skulu arva landið um ævir, greinin av planting míni, verk handa mína, at eg má verða dýrðmettur.

22 Ein lítil ēin skal verða túsund, og ein smáur ēin ein sterk tjóð: eg HARRIN vil skunda tað í tíð síni.

KAPITUL 61

ANDI Harrans GUÐS *er* uppiá mær; av tí at HARRIN hevur salvað meg til at prædika góð tíðindir at teimum eyðmjúku; hann hevur sent meg at binda um hini hjartabrotnu, at kunngera frælsi fyri fangunum, og upplatingina av fongslinum fyri *teimum ið eru* bundin;

2 At kunngera hitt góðtakiliga ár HARRANS, og hevndardag Guðs vár; at ugga øll sum syrgja;

3 At útnevna teimum sum syrgja í Zion, at geva teimum vakurleika fyri øskur, og gleðis oljuna fyri harman, *lovprís*ingar klæðið fyri tyngdar andan; at tey máttu verða kallað rættvísis trø, planting HARRANS, at hann mátti verða dýrðmettur.

4 ¶ Og teir skulu byggja hinar gomlu toftir, teir skulu reisa upp hinar fyrru rustir, og teir skulu væla um hinar oydnu staðir, rustirnar av mongum ættarliðum.

5 Og fremmandir skulu standa og føða tykkara smáfæafylgir, og synirnir hjá ókunnumanninum *skulu vera* tykkara pløgingarmenn og tykkara víngarðsmenn.

6 Men tit skulu verða nevndir Prestar HARRANS: *menn* skulu kalla tykkum Tænarar Guðs vár: tit skulu eta ríkidømir Heidninganna, og í teirra dýrd skulu tit rósa tykkum.

7 ¶ Fyri tykkara skomm *skulu tit hava* tvífalt; og *fyri* ørkymlan skulu teir fegnast í skamti sínum: tessvegna í landi sínum skulu teir ognast tað tvífalda: ævigtvarandi gleði skal vera at teimum.

8 Tí at eg HARRIN elski dóm, eg hati rán fyri brennioffur; og eg vil leiðbeina teirra verk í sannleika, og eg vil gera ein ævigtvarandi sáttmála við teir.

9 Og teirra sáð skal verða kent

millum Heidninganna, og teirra avkom millum fólksins: allir, ið síggja teir, skulu viðurkenna teir, at teir *eru* tað sáðið *sum* HARRIN hevur vælsignað.

10 Eg vil stórliga fegnast í HARRANUM, mín sál skal vera frødlig í Guði mínum, tí at hann hevur klætt meg við klæðum frelsunnar, hann hevur dekkað meg við skikkju rættvísinnar, sum ein brúðgómur dekkar *seg* við prýðislutum, og sum ein brúður prýðir *seg* við smúkkum sínum.

11 Tí at eins og jørðin ber fram spíra sín, og eins og urtagarðurin elvir tingunum, sum eru sáað í honum, at spretta fram; soleiðis vil Harrin GUÐ elva rættvísi og *lovprísan* at spretta fram frammi fyri øllum tjóðunum.

KAPITUL 62

FYRI Zions skuld vil eg ikki halda friði mínum, og fyri Jerusalems skuld vil eg ikki hvíla, inntil tess rættvísi gangi fram sum bjartleiki, og tess frelsa sum ein lampa *sum* brennur.

2 Og Heidningarnir skulu sjá tína rættvísi, og allir kongar tína dýrd: og tú skalt verða kallað við nýggjum navni, sum HARRANS munnur skal nevna.

3 Tú skalt eisini vera ein krúna av dýrd í hond HARRANS, og eitt kongligt ennisprýði í hond Guðs tíns.

4 Tú skalt ei meira verða rópt Yvirgivin; eiheldur skal land títt meir verða rópt Oyðið: men tú skalt verða kallað Hĕph´-zī-băh, og land títt Bĕū´-lăh: tí at HARRIN fragdast í tær, og títt land skal giftast.

5 ¶ Tí at *sum* ein ungur maður giftist *við* eini jomfrú, *soleiðis* skulu synir tínir giftast *við* tær: og *eins og* brúðgómurin fegnast yvir brúðrini, *soleiðis* skal Guð tín fegnast yvir tær.

6 Eg havi sett varðmenn uppá tínar múrar, O Jerusalem, *sum* skulu aldri halda friði sínum dag ella nátt: tit, sum nevna HARRAN, haldið ikki tøgn,

7 Og gevið honum onga hvílu, til hann grundfesti, og til hann geri Jerusalem *til* eina *lovprísan* á jørðini.

8 HARRIN hevur svorið við síni høgru hond, og við arminum av síni styrki, Vissuliga, eg vil ei meira geva korn títt *til at vera* matur til fígginda tína; og synirnir hjá tí fremmanda skulu ikki drekka vín títt, fyri hvørt tú hevurt strevað:

9 Men teir, sum hava savnað tað, skulu eta tað, og prísa HARRANUM; og teir, sum hava ført tað saman, skulu drekka tað í forgørðunum av mínum heilagleika.

10 ¶ Farið ígjøgnum, farið ígjøgnum portrini; fyribúgvið tit veg fólksins; laðið upp, laðið upp alfaravegin; savnið út steinarnar; lyftið upp eitt merki fyri fólkið.

11 Sí, HARRIN hevur kunngjørt til enda veraldarinnar, Sigið tit til dóttur Zions, Sí, frelsa tín kemur; sí, hans endurgjald *er* við honum, og hansara verk frammi fyri honum.

12 Og teir skulu kalla teir, Tað heilaga fólkið, HARRANS endurloystu: og tú skalt verða kallað, Uppsøkt, Ein staður ikki yvirgivin.

KAPITUL 63

HVØR *er* hesin sum kemur frá Ē´-dóm, við litaðum klæðum frá Bŏz´-răh? hesin *sum er* dýrdsamur í sínum skarti, ferðandi í stórleikanum av síni styrki? eg, sum tali í rættvísi, mektigur til at frelsa.

2 Hví *ert tú* reyður í tínum skarti, og tíni klæðir líka *sum* hann sum treður í vínfeittinum?

3 Eg havi troðið vínfargið ein-

samallur; og av fólkinum *var tað* eingin við mær: tí at eg vil treða teir í míni firtni, og trampa teir í míni øði; og teirra blóð skal verða slett uppá míni klæðir, og eg vil bletta allan mín klædnað.

4 Tí at hevndardagurin *er* í hjarta mínum, og árið hjá mínum endurloystu er komið.

5 Og eg hugdi, og *har var* eingin at hjálpa; og eg undraðist, at *har var* eingin at halda uppi: tí førdi mín egni armur mær frelsu; og mín øði, hon uppihelt mær.

6 Og eg vil treða niður fólkið í míni firtni, og gera teir druknar í míni øði, og eg vil føra niður teirra styrki til jørðina.

7 ¶ Eg vil nevna elskandi blídsemir HARRANS, *og lovprísingar* HARRANS, samsvarandi við alt sum HARRIN hevur skonkt á okkum, og hina miklu góðsemi ímóti húsi Israels, sum hann hevur skonkt á teir samsvarandi við sínar miskunnir, og samsvarandi við fjøldleikan av sínum elskandi blídsemum.

8 Tí at hann segði, Vissuliga, teir *eru* fólk mítt, børn *sum* vilja ikki lúgva: so hann var teirra Frelsari.

9 Í allari teirra nívd varð hann nívdur, og eingilin av hansara nærveru frelsti teir: í kærleika sínum og í síni várkunn hann endurloysti teir; og hann tók teir upp, og bar teir allar dagarnar úr fordum.

10 ¶ Men teir gjørdu uppreist, og nívdu hans heilaga Anda: tí varð hann vendur til at vera teirra figgindi, *og* hann bardist ímóti teimum.

11 Tá mintist hann dagarnar í fordum, Móses, *og* fólk sítt, *sigandi,* Hvar *er* hann sum førdi teir upp út úr sjónum við hirða fylgis síns? hvar *er* hann sum legði sín heilaga Anda innan í honum?

12 Sum leiddi *teir* við hˆ høgru hendi Móse við sínum dýrdsama armi, atskiljandi vatnið frammi fyri teimum, at gera sær sjálvum eitt ævigtvarandi navn?

13 Sum leiddi teir ígjøgnum djúpið, sum ein hestur í oyðuni, *at* teir skuldu ikki snáva?

14 Eins og eitt djór fer oman í dalin, voldi Andi HARRANS honum at hvíla: soleiðis leiddirt tú fólk títt, at gera tær sjálvum eitt dýrdsamt navn.

15 ¶ Hygg niður frá himni, og skoða frá býli heilagleika tíns og dýrdar tínar: hvar *er* vandlæti títt og styrki tín, ljóðingin av tínum innangoymslum og av tínum miskunnum mótvegis mær? eru tær afturhildnar?

16 Iyaleyst, tú *ert* faðir vár, hóast Ábraham veri *seg* óvitandi um okkum, og Ísrael viðurkenni okkum ikki: tú, O HARRI, *ert* faðir vár, endurloysari vár; títt navn *er* frá ævigtvarandi.

17 ¶ O HARRI, hví hevurt tú fingið okkum at fara skeivar frá tínum vegum, *og* hert okkara hjarta frá tínum ótta? Vend aftur fyri skyld tænara tína, ættargreina arvs tíns.

18 Fólk heilagleika tíns hava ognarhildið *tað* bert *í* eitt lítið bil: okkara mótstandarar hava traðkað niður tín halgidóm.

19 Vit eru *tínir:* tú satst aldri við stjórn yvir teimum; teir vórðu ikki kallaðir við navni tínum.

KAPITUL 64

Á, at tú vildirt skrætt himnarnar, at tú vildirt komið niður, at fjøllini máttu runnið niður fyri nærveru tíni,

2 Sum *tá ið* hin smeltandi eldur brennur, elvir eldurin vøtnunum at sjóða, at gera navn títt kunnugt fyri mótstandarum tínum, *at* tjóðirnar mega nøtra fyri nærveru tíni!

3 Tá ið tú gjørdirt ræðulig ting, *sum* vit væntaðu ikki eftir, tú komst niður, fjøllini runnu niður fyri nærveru tíni.

4 Tí at síðan byrjan veraldarinnar hava *menn* ikki hoyrt, ella varnast við oyranum, eiheldur hevur eygað sæð, O Guð, umframt tú, *hvat* hann hevur fyribúgvið til hansara sum væntar eftir honum.

5 Tú møtirt honum sum fegnast og virkar rættvísi, *teimum ið* minnast til tín á vegum tínum: sí, tú ert vreiður; tí at vit hava syndað: í teimum er áframhaldni, og vit skulu verða frelstir.

6 Men vit eru allir eins og eitt óreint *ting*, og allar okkara rættvísir *eru* sum gravskitnir spjarrar; og vit allir følna sum eitt leyv; og okkara misgerðir, sum vindurin, hava tikið okkum burt.

7 Og *tað er* eingin sum kallar uppá navn títt, sum ruskar í seg sjálvan at taka hald á tær: tí at tú hevurt fjalt títt andlit frá okkum, og hevurt upptært okkum, uppá grund av okkara misgerðum.

8 Men nú, O HARRI, tú *ert* faðir vár; vit *eru* leirið, og tú okkara leirkerasmiður; og vit allir *eru* verk handa tína.

9 ¶ Ver ikki vreiður sera sára, O HARRI, eiheldur minst til misgerð um ævir: sí, hygg, vit bøna teg, vit *eru* allir fólk títt.

10 Tínir heilagu staðir eru eitt reyn, Zion er eitt reyn, Jerusalem ein oyðing.

11 Várt heilaga og várt vakra hús, har okkara fedrar prísaðu tær, er brent upp við eldi: og øll okkara dámligu ting eru løgd *í* oyði.

12 Vilt tú halda tær fyri hesi *ting*, O HARRI? vilt tú halda friði tínum, og plága okkum sera sára?

KAPITUL 65

EG eri søktur av *teim sum* ei spurdu *eftir mær;* eg eri funnin av *teim sum* søktu meg ei: eg segði, Skoðið meg, skoðið meg, við eina tjóð *sum* var ikki kallað við navni mínum.

2 Eg havi breitt út mínar hendur allan dagin at einum uppreistrarsomum fólki, sum gongur í einum vegi *sum var* ikki góður, eftir sínum egnu hugsanum;

3 Eitt fólk sum tirrar meg til firtnis støðugt upp í mítt andlit; sum sláturofrar í urtagørðum, og brennur roykilsi uppiá tigulsteins altarum;

4 Sum eru verandi gravanna millum, og halda til í minnismerkjunum, sum eta svínskjøt, og soðið av andstyggiligum *tingum er í* teirra kerum;

5 Sum siga, Statt fyri teg sjálvan, kom ikki nær til mín; tí eg eri halgari enn tú. Hesir *eru* ein roykur í míni nøs, ein eldur sum brennur allan dagin.

6 Sí, *tað stendur* skrivað frammman fyri mær: eg vil ikki halda tøgn, men vil endurgjalda, enntá endurgjalda inn í teirra barm,

7 Tykkara misgerðir, og misgerðirnar hjá tykkara fedrum tilsaman, sigur HARRIN, sum hava brent roykilsi uppiá fjøllunum, og Guðsspottað meg uppiá heyggjunum: tí vil eg máta teirra fyrra verk inn í teirra barm.

8 ¶ Svá sigur HARRIN, Eins og hitt nýggja vínið finst í tyssinum, og *ēin* sigur, Oyðilegg tað ikki; tí ein signing *er* í tí: so vil eg gera fyri tænara mína sakir, at eg má ikki oyða teir allar.

9 Og eg vil bera fram eitt sáð út úr Jákobi, og út úr Judah ein arvinga til fjalla mína: og mín útvaldi skal arva tað, og mínir tænarar skulu búgva har.

10 Og Sjár'-ōn skal vera eitt byrgi hjá smáfæafylgjum, og Á'-chôr-s dalur eitt pláss til stórfæafylgini at leggjast niður í, til fólk mítt sum hava søkt meg.

11 ¶ Men tit *eru* teir sum yvirgeva HARRAN, sum gloyma mítt heilaga fjall, sum fyribúgva eitt borð til handan flokkin, og sum búgva út drekkiofrið at hasum talinum.

12 Tí vil eg upptelja tykkum til svørðið, og tit skulu allir lúta niður til slátringina: av tí at tá ið eg kallaði, svaraðu tit ikki; tá ið eg talaði, hoyrdu tit ikki; men gjørdu ilt frammi fyri eygum mínum, og valdu *hatta,* í hvørjum eg fragdaðist ei.

13 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ, Sí, mínir tænarar skulu eta, men tit skulu vera svangir: sí, mínir tænarar skulu drekka, men tit skulu vera tyrstir: sí, mínir tænarar skulu fegnast, men tit skulu skammast:

14 Sí, mínir tænarar skulu syngja vegna hjartafrøi, men tit skulu rópa vegna hjartaharm, og skulu skrenja vegna ergran av anda.

15 Og tit skulu eftirlata tykkara navn at mínum útvaldu til eina banning: tí at Harrin GUÐ skal vega teg, og kalla sínar tænarar við einum øðrum navni:

16 At hann, sum signar seg sjálvan á jørðini, skal signa seg sjálvan í Guði sannleikans; og hann, sum svør á jørðini, skal svørja við Guð sannleikans; av tí at tær fyrru trongdirnar eru gloymdar, og av tí at tær eru fjaldar frá eygum mínum.

17 ¶ Tí at sí, eg skapi nýggjar himnar og eina nýggja jørð: og hini fyrru skulu ikki verða mint, ella koma í huga.

18 Men verið tit glaðir og fegnist um ævir *í tí* sum eg skapi: tí at sí, eg skapi Jerusalem eina fagnan, og hennara fólk eina frøi.

19 Og eg vil fegnast í Jerusalem, og frøast í fólki mínum: og røddin á gráti skal ei meira verða hoyrd í henni, ella røddin á geylan.

20 Har skal ei meira haðani vera daga *gamal* nýføðingur, ella ein gamalur maður sum ei hevur fylt sínar dagar: tí at barnið skal doyggja hundrað ára gamalt; men syndarin, *sum er* hundrað ára gamalur, skal vera bannaður.

21 Og teir skulu byggja hús, og búgva í *teimum;* og teir skulu planta víngarðar, og eta ávøkstin av teimum.

22 Teir skulu ikki byggja, og ein annar búgva í; teir skulu ikki planta, og ein annar eta: tí at eins og dagarnir hjá einum træi *eru* dagarnir hjá mínum fólki, og mínir útvaldu skulu leingi njóta verkið av sínum hondum.

23 Teir skulu ikki strevast til fánýtis, ella bera fram til trongdar; tí at teir *eru* sáð hinna signaðu HARRANS, og teirra avkom við teimum.

24 Og tað skal bera á, at áðrenn teir kalla, eg vil svara; og meðan teir enn tala, eg vil hoyra.

25 Úlvurin og lambið skulu *ganga* á biti tilsaman, og leyvan skal eta strá líka *sum* tarvurin: og støv *skal vera* maturin hjá høggorminum. Teir skulu ikki skaða, ella oyðileggja, á øllum mínum heilaga fjalli, sigur HARRIN.

KAPITUL 66

SVÁ sigur HARRIN, Himinin *er* tróna mín, og jørðin *er* mín fótskammul: hvar *er* tað hús sum tit byggja mær? og hvar *er* stað hvíldar mínar?

2 Tí at øll hasi *ting* hevur hond mín gjørt, og øll hasi *ting* hava verðið, sigur HARRIN: men til hesa *mans* vil eg hyggja, *enntá* til *hansara sum er* armur og av einum knústum anda, og nøtrar fyri orði mínum.

3 Hann, sum drepur ein oksa, *er sum um* hann vó ein mann; hann, sum sláturofrar eitt lamb, *sum um* hann skar av hunds háls; hann,

sum ofrar eitt tilbiðjanar-offur, *sum um hann ofraði* svínsblóð; hann, sum brennur roykilsi, *sum um* hann vælsignaði ein skurðgud. Ja, teir hava valt sínar egnu vegir, og teirra sál fragdast í teirra andstygdum.

4 Eg eisini vil velja teirra villleiðingar, og vil føra teirra óttar uppá teir; av tí at tá ið eg kallaði, svaraði eingin; tá ið eg talaði, hoyrdu teir ikki: men teir gjørdu ilt frammi fyri eygum mínum, og valdu *hatta,* í hvørjum eg fragdaðist ikki.

5 ¶ Hoyrið HARRANS orð, tit sum nøtra fyri hans orði; Tykkara brøður sum hataðu tykkum, sum kastaðu tykkum út fyri navns míns skuld, søgdu, Latið HARRAN verða dýrðmettan: men hann skal birtast til tykkara frøi, og teir skulu skammast.

6 Ein rødd av ljóði frá staðinum, ein rødd frá templinum, ein rødd HARRANS sum rindar endurgjald til hansara figgindar.

7 Áðrenn hon hevði verkir, bar hon fram; áðrenn hennara pína kom, varð hon útfríað *við* einum sveinsbarni.

8 Hvør hevur hoyrt slíkt ting? hvør hevur sæð slík ting? Skal jørðin verða fingin at bera fram í ēinum degi? *ella* skal ein tjóð verða fødd alt fyri eitt? tí at so skjótt sum Zion hevði verkir, bar hon fram síni børn.

9 Skal eg føra til føðingina, og ikki fáa at bera fram? sigur HARRIN: skal eg fáa at bera fram, og loka *móðurlívið?* sigur Guð tín.

10 Fegnist tit við Jerusalem, og verið glaðir við henni, allir tit sum elska hana: fegnist av frøi við henni, allir tit sum syrgja yvir hana:

11 At tit mega súgva, og verða mettaðir við bróstunum av hennara troystanum; at tit mega mjólka út, og verða fragdaðir við ríkiligsemini av hennara dýrd.

12 Tí at svá sigur HARRIN, Sí, eg vil framrætta frið til hennara sum eina á, og Heidninganna dýrd sum ein fløðandi streym: tá skulu tit súgva, tit skulu verða bornir uppiá *hennara* síðum, og verða dandaðir uppiá *hennara* knøum.

13 Eins og ēin sum hansara móður uggar, soleiðis vil eg ugga tykkum; og tit skulu verða uggaðir í Jerusalem.

14 Og tá ið tit síggja *hetta,* skal tykkara hjarta fegnast, og tykkara bein skulu blómka sum ein urt: og HARRANS hond skal verða kunn mótvegis hansara tænarum, og *hans* harmavreiði mótvegis hansara figgindum.

15 Tí at sí, HARRIN vil koma við eldi, og við sínum vagnum sum ein meldurvindur, at rinda sína firtni við øði, og sína hartan við flammum av eldi.

16 Tí at við eldi og við sínum svørði vil HARRIN føra søk við alt kjøt: og hinir vignu HARRANS skulu vera mangir.

17 Teir sum halga seg sjálvar, og skírga seg sjálvar í urtagørðunum aftanfyri ēitt *træ* í miðjuni, etandi svínskjøt, og andstygdina, og músina, skulu verða upptærdir tilsaman, sigur HARRIN.

18 Tí at eg *veit* teirra verk og teirra hugsanir: tað skal koma, at eg vil savna allar tjóðir og tungur; og teir skulu koma, og sjá mína dýrd.

19 Og eg vil seta eitt tekin teirra millum, og eg vil senda teir, sum komast undan av teimum, at tjóðunum, *til* Tarsjisj, Pŭl, og Lŭd, sum spenna bogan, *til* Tŭ́-băl, og Já́-văn, *til* oyggjarnar langt burturifrá, sum hava ikki hoyrt mítt giti, eiheldur hava sæð mína dýrd; og teir skulu kunngera mína dýrd Heidninganna millum.

20 Og teir skulu koma við øllum tykkara brøðrum *til* eitt offur at HARRANUM út úr øllum tjóðum uppiá hestum, og í vagnum, og í burðarstólum, og uppiá múldjórum, og uppiá skjótum djórum, til mítt heilaga fjall Jerusalem, sigur HARRIN, eins og Ísraels børn bera eitt offur í einum reinum keri inn í hús HARRANS.

21 Og eg vil eisini taka av teimum til prestar *og* til Levitar, sigur HARRIN.

22 Tí at eins og teir nýggju himnarnir og hin nýggja jørðin, sum eg vil gera, skulu verða verandi frammi fyri mær, sigur HARRIN, soleiðis skal sáð tykkara og navn tykkara verða verandi.

23 Og tað skal bera á, *at* frá ēinum nýmána til ein annan, og frá ēinum sabbati til ein annan, skal alt hold koma at tilbiðja frammi fyri mær, sigur HARRIN.

24 Og teir skulu fara fram, og hyggja uppá ræini av teimum monnunum sum hava misbrotist ímóti mær: tí at teirra ormur skal ikki doyggja, eiheldur skal teirra eldur verða sløktur; og teir skulu vera ein stiknan at øllum kjøti.

BÓK PROPHETSINS
JEREMIAH.

KAPITUL 1

ORÐINI av Jeremiah Hĭl´-kĭ-ăh syni, av prestunum sum *vóru* í Án´-ă-thōth í landi Benjamins:

2 Til hvørs HARRANS orð kom í døgum Jó´-sĭ-ăh Ámons sonar, Judah kongs, í hinum trettanda ári av ríkjan hans.

3 Tað kom eisini í døgum Jĕ-hŏi´-ă-kĭm-s Jó´-sĭ-ăh sonar, Judah kongs, *fram*at endanum á hinum ellivta ári Zĕd-ē-kī´-ăh Jó´-sĭ-ăh sonar, Judah kongs, *fram*at beringini burtur av Jerusalem *til* fanga í hinum fimta mánaði.

4 Tá kom orð HARRANS at mær, sigandi,

5 Áðrenn eg myndaði teg í kviðinum, kendi eg teg; og áðrenn tú komst fram út úr móðurlívinum, halgaði eg teg, *og* eg innsetti teg ein prophet yvirfyri tjóðunum.

6 Tá segði eg, Á, Harri GUÐ! Sí, eg dugi ikki *at* tala: tí at eg *eri* eitt barn.

7 ¶ Men HARRIN segði við meg, Sig ikki, eg *eri* eitt barn: tí at tú skalt fara til alra sum eg skal senda teg, og hvatsumhelst *ið* eg bjóði tær skalt tú tala.

8 Ver ikki ræddur fyri teirra andlitum: tí at eg *eri* við tær til at bjarga tær, sigur HARRIN.

9 Tá koyrdi HARRIN fram sína hond, og nam við munn mín. Og HARRIN segði við meg, Sí, eg havi lagt orð míni í munn tín.

10 Sí, eg havi henda dag sett teg yvir tjóðunum og yvir kongadømunum, til at *slíta* upp *við* rót, og at hála niður, og at oyðileggja, og at kasta niður, at byggja, og at planta.

11 ¶ Harafturat kom HARRANS orð at mær, sigandi, Jeremiah, hvat sært tú? Og eg segði, Eg síggi ein sprota av einum mandlutræi.

12 Tá segði HARRIN við meg, Tú hevurt væl sæð: tí at eg vil skunda mítt orð at útinna tað.

13 Og HARRANS orð kom at mær aðru ferðina, sigandi, Hvat sært tú? Og eg segði, Eg síggi ein sjóðandi pott; og ásjónin hará *er* ímóti norðan.

14 Tá segði HARRIN við meg,
Út úr norðuri skal ein ilska bróta
út uppá allar íbúgvar landsins.
15 Tí at sí, eg vil kalla allar familjurnar av kongadømum norðursins, sigur HARRIN; og teir skulu koma, og teir skulu seta hvør *og* ēin sína trónu við inngongdina av portrum Jerusalems, og ímóti øllum tess múrum runt um, og ímóti øllum staðum Judah.
16 Og eg vil mæla mínar dómar ímóti teimum viðvíkjandi øllum teirra vondskum, sum[P] hava yvirgivið meg, og hava brent roykilsi at øðrum gudum, og tilbiðið verkini av sínum egnu hondum.
17 ¶ Tú tessvegna, gyrð upp lendar tínar, og reis *teg,* og tala innat teimum alt sum eg ábjóði tær: ver ikki mótfallin yvirfyri teirra andlitum, at ikki eg fjamski teg frammi fyri teimum.
18 Tí at sí, eg havi gjørt teg henda dag *til* ein víggirdan stað, og eina jarn súlu, og messing múrar ímóti øllum landinum, ímóti kongunum av Judah, ímóti prinsum tess, ímóti prestum tess, og ímóti fólki landsins.
19 Og teir skulu berjast ímóti tær; men teir skulu ikki hava yvirvág ímóti tær; tí at eg *eri* við tær, sigur HARRIN, til at bjarga tær.

KAPITUL 2

HARAFTURAT kom orð HARRANS til mín, sigandi,
2 Far og geyla í oyruni á Jerusalem, sigandi, Svá sigur HARRIN;
Meg minnist teg, blíðsemina av tínum ungdómi, kærleikan av tínum trúlovingum, tá ið tú fórt aftaná mær í oyðuni, í einum landi *sum* ei *var* sáað.
3 Ísrael *var* heilagleiki at HARRANUM, *og* frumávøkstir grøðis hans: allir, sum upptæra hann, skulu misbrótast; ilt skal koma uppá teir, sigur HARRIN.
4 Hoyrið tit orð HARRANS, O hús Jákobs, og allar familjurnar av húsi Ísraels:
5 ¶ Svá sigur HARRIN, Hvørja misgerð hava tykkara fedrar funnið í mær, at teir eru farnir fjart frá mær, og hava gingið eftir fáfongd, og eru vorðnir fáfongdir?
6 Eiheldur søgdu teir, Hvar *er* HARRIN sum førdi okkum upp út úr Egyptalandi, sum leiddi okkum ígjøgnum oyðuna, ígjøgnum eitt land av oyðimørkum og av holum, ígjøgnum eitt land av turki, og av skugga deyðans; ígjøgnum eitt land sum eingin maður fór ígjøgnum, og har eingin maður dvaldist?
7 Og eg førdi tykkum inn í eitt ríviligt land, at eta ávøkstir tess og góðsemi tess; men tá ið tit innfóru, dálkaðu tit land mítt, og gjørdu mín arvalut *til* eina andstygd.
8 Prestarnir søgdu ikki, Hvar *er* HARRIN? og teir, sum handfara lógina, kendu meg ikki: hirðarnir eisini misbrutu ímóti mær, og prophetarnir propheteraðu við Bā'-ăl, og gingu eftir *tingum sum* gagna ikki.
9 ¶ Hvørsvegna eg vil enn føra søk við tykkum, sigur HARRIN, og við tykkara barnabørn vil eg føra søk.
10 Tí at farið yvir Chĭt'-tĭm-s oyggjar, og vitið; og sendið at Kē'-dăr, og umhugsið dúgliga, og vitið um har veri *seg* nakað tílíkt.
11 Hevur ein tjóð skift *sínar* gudar, sum *eru* tó eingir gudar? men fólk mítt hava skift sína dýrd fyri *hatta sum* gagnar ikki.
12 Verðið ógvaðir, O tit himnar, yvirfyri hesum, og verðið ræðuliga ræddir, verðið tit sera oydnir, sigur HARRIN.
13 Tí at fólk mítt hava framt tvey ill*verk;* teir hava yvirgivið meg – keldu livandi vatna, *og* høgt sær út brunnar, brotnar brunnar, sum einkið vatn kunnu halda.

14 ¶ *Er* Ísrael ein tænari? *er* hann ein heimaføddur *trælur?* hví er hann rændur?

15 Hinar ungu leyvur brølaðu uppá hann, *og* ýldu, og tær gjørdu land hans oyði: hansara staðir eru brendir uttan íbúgva.

16 Eisini børnini at Nōph og Tă-hăp'-ă-nēs hava brotið krúnu høvurs tíns.

17 Hevurt tú ikki útvegað tær sjálvum hetta, í at tú hevurt yvirgivið HARRAN Guð tín, tá ið hann leiddi teg eftir veginum?

18 Og nú, hvat hevurt tú at gera í vegi Egyptalands, at drekka vøtn Sī'-hôr-s? ella hvat hevurt tú at gera í vegi Assýriu, at drekka vøtn løkjarins?

19 Tín egna vondska skal rættleiða teg, og tíni fráføll skulu írættaseta teg: vita tí og síggj, at *tað er* eitt ilt *ting* og beiskt, at tú hevurt yvirgivið HARRAN Guð tín, og at mín ótti *er* ikki í tær, sigur Harrin GUÐ herliðanna.

20 ¶ Tí at úr gamlari tíð havi eg brotið ok títt, *og* brostið bond tíni; og tú segðirt, Eg vil ikki misbróta; tá ið uppiá hvørjum høgum heyggi og undir hvørjum grønum træi tú reikart, spælandi skøkjan.

21 Tó hevði eg plantað teg — eitt tignarligt víntræ, heil*veg*is eitt rætt sáð: hvussu ert tú tá snúð yvirí hina vanættaðu plantu av einum fremmandum víntræi yvirfyri mær?

22 Tí at tó *at* tú tvái tær við nátron, og taki tær nógva sápu, *tó* er tín misgerð merkt *inní* frammi fyri mær, sigur Harrin GUÐ.

23 Hvussu kanst tú siga, Eg eri ikki óreinkað, eg havi ikki gingið eftir Bā'-ă-lĭm? síggj veg tín í dalinum, skyna hvat tú hevurt gjørt: *tú ert* ein skjótur dromedārur — svívandi vegir sínar;

24 Ein villøsna — von við oyðuna, *sum* snúsar upp vindin við sína lyst; við hennara høvi, hvør kann venda henni burt? allir teir, sum søkja hana, vilja ikki møða seg; í hennara mánaði skulu teir finna hana.

25 Halt aftur tínum fóti frá at vera óskøddur, og tínum hálsi frá torsta: men tú segðirt, Tað er eingin vón: nei; tí at eg havi elskað fremmandar, og eftir teim vil eg fara.

26 Eins og tjóvurin skammast tá ið hann er funnin, soleiðis skammast hús Ísraels; teir, teirra kongar, teirra prinsar, og teirra prestar, og teirra prophetar,

27 Sigandi til eina stammu, Tú *ert* faðir mín; og til ein stein, Tú hevurt borið meg fram: tí at teir hava vent *sínum* baki at mær, og ei *sínum* andliti: men í tíðini av teirra trongd vilja teir siga, Reis *teg*, og frels okkum.

28 Men hvar *eru* gudar tínir sum tú hevurt gjørt tær? lat teir reisa *seg*, um teir kunnu frelsa teg í tíðini av tíni trongd: tí at *samsvarandi við* talið á tínum staðum eru tínir gudar, O Judah.

29 Hvørsvegna vilja tit føra søk við meg? tit allir hava misbrotist ímóti mær, sigur HARRIN.

30 Til fánýtis havi eg sligið tykkara børn; tey tóku við ongari rættleiðing: tykkara egna svørð hevur uppslúkað prophetar tykkara, sum ein oyðandi leyva.

31 ¶ O ætt, síggið tit HARRANS orð. Havi eg verið ein oyða at Ísrael? eitt land av myrkri? hvørsvegna siga fólk mítt, Vit eru harrar; vit vilja ei meira koma at tær?

32 Kann ein moyggj gloyma sínar prýðislutir, *ella* ein brúður sítt skrúð? tó hava fólk mítt gloymt meg — dagar uttan tal.

33 Hví trimmart tú veg tín til at søkja kærleika? tí hevurt tú eisini frálært hinum vondu tínar vegir.

34 Eisini í tínum skeytum er
funnið blóðið av sálunum hjá
teimum ørmu sakleysu: eg havi
ikki funnið tað við loyndari kann-
ing, men uppiá øllum hesum.
35 Tó sigurt tú, Av tí at eg
eri sakleys, skal vissuliga hansara
firtni venda frá mær. Sí, eg vil
føra søk við teg, av tí at tú sigurt,
Eg havi ikki syndað.
36 Hví streyfart tú um so mik-
ið *fyri* at broyta tín veg? tú eisini
skalt skammast um Egyptaland,
eins og tú skammaðist um Ass-
ýriu.
37 Ja, tú skalt fara út frá hon-
um, og tínar hendur uppiá tínum
høvdi: tí at HARRIN hevur havn-
að tínum álitum, og tú skalt ikki
framganga í teimum.

KAPITUL 3

TEIR siga, Um ein maður
koyri burt sína ektakonu, og
hon fari frá honum, og gerist
annars mans, skal hann venda
aftur at henni aftur? skal ikki
tað land verða stórliga óreinkað?
men tú hevurt spælt skøkjan við
mongum elskarum; tó vend aftur
til mín, sigur HARRIN.
2 Lyft upp eygum tínum at hin-
um høgu plássum, og síggj hvar
tú hevurt ikki verðið ligin við. Á
vegunum hevurt tú sitið fyri teir,
eins og Arabarin í oyðuni; og tú
hevurt óreinkað landið við hor-
dómum tínum og við vondsku
tíni.
3 Tí hava skúrirnir verðið
afturhildnir, og tað hevur einkið
seinna regn verið; og tú hevðirt
horu enni, tú sýttirt at skammast.
4 Vilt tú ikki frá hesi tíð rópa
á meg, Mín faðir, tú *ert* vegleiðari
ungdóms míns?
5 Vil hann leggja burturav *sína*
firtni um ævir? vil hann goyma
hana til endan? Sí, tú hevurt
talað og gjørt ill ting, eins og tú
kundirt.
6 ¶ HARRIN segði eisini við
meg í døgum Jó-sí-ah kongs,
Hevurt tú sæð *tað* sum fráfall-
andi Ísrael hevur gjørt? hon er
farin niðan uppá hvørt høgt fjall
og undir hvørt grønt træ, og har
hevur spælt skøkjan.
7 Og eg segði, eftir *at* hon
hevði gjørt øll hesi *ting,* Vend tú
at mær. Men hon vendi ikki
aftur. Og hennara svikræðisliga
systir Judah sá *tað*.
8 Og eg sá, tá ið fyri allar tær
grundir, við hvørjum fráfallandi
Ísrael framdi hordóm, eg hevði
koyrt hana burtur, og givið henni
eitt skilnaðarskriv; tó óttaðist
hennara svikræðisliga systir Jud-
ah ikki, men fór og spældi skøkjan
eisini.
9 Og tað bar á gjøgnum lætt-
isligleika hordóms hennara, at hon
óreinkaði landið, og framdi hor-
dóm við steinum og við stammum.
10 Og tó fyri alt hetta hevur
hennara svikræðisliga systir Jud-
ah ikki vent aftur at mær við heila
hjarta sínum, men falsanarliga,
sigur HARRIN.
11 Og HARRIN segði við meg,
Fráfallandi Ísrael hevur rættvís-
gjørt seg sjálva meiri enn svik-
ræðisliga Judah.
12 ¶ Far og kunnger hesi orð
mótvegis norðan, og sig, Vend
aftur, tú fráfallandi Ísrael, sigur
HARRIN; *og* eg vil ikki volda míni
firtni at falla omanyvir tykkum:
tí at eg *eri* miskunnarfullur, sigur
HARRIN, *og* eg vil ikki goyma *firtni*
um ævir.
13 Einans viðgakk tína mis-
gerð, at tú hevurt misbrotist
ímóti HARRANUM Guði tínum, og
hevurt spjatt tínar vegir til hinna
fremmandu undir hvørjum grøn-
um træi, og tit hava ikki lýtt mína
rødd, sigur HARRIN.
14 Vendið, O fráfallandi børn,
sigur HARRIN; tí at eg eri giftur at
tykkum: og eg vil taka tykkum,

ēin úr einum staði, og tveir úr eini familju, og eg vil føra tykkum til Zion:

15 Og eg vil geva tykkum hirðar samsvarandi við hjarta mítt, sum skulu føða tykkum við kunnleika og skili.

16 Og tað skal bera á, tá ið tit verði margfaldaðir og øktir um í landinum, í teimum døgum, sigur HARRIN, skulu teir ei meira siga, Ørk sáttmála HARRANS: eiheldur skal hon koma til hugs: eiheldur skulu teir minnast til hennara; eiheldur skulu teir vitja *hana;* eiheldur skal *hatta* verða gjørt meira.

17 Á teirri tíð skulu teir kalla Jerusalem hásæti HARRANS; og allar tjóðirnar skulu verða savnaðar at tí, til navns HARRANS, til Jerusalem: eiheldur skulu teir ganga meira eftir ímyndan illa hjarta síns.

18 Í teimum døgum skal Judah hús ganga við Ísraels húsi, og teir skulu koma saman úr landi norðursins til landið sum eg havi givið til ein arv at tykkara fedrum.

19 Men eg segði, Hvussu skal eg seta teg barnanna millum, og geva tær eitt dámligt land, ein stásiligan arvalut hjá herliði tjóða? og eg segði, Tú skalt kalla meg, Mín faðir; og skalt ei venda burtur frá mær.

20 ¶ Vissuliga, *eins og* ein ektakona svikræðisligani fer avstað frá sínum ektamanni, soleiðis hava tit farið svikræðisligani við mær, O Ísraels hús, sigur HARRIN.

21 Ein rødd varð hoyrd uppiá hinum høgu plássum, gráting *og* umbøningar hjá børnum Ísraels: tí at teir hava spilt sín veg, *og* teir hava gloymt HARRAN Guð sín.

22 Vendið aftur, tit fráfallandi børn, *og* eg vil grøða tykkara fráføll. Sí, vit koma til tín; tí at tú *ert* HARRIN Guð vár.

23 Vissuliga, til fánýtis *er frelsa vónað eftir* frá heyggjunum, *og frá* fjøldini av fjøllum: vissuliga, í HARRANUM Guði várum *er* frelsa Ísraels.

24 Tí at skomm hevur upptært strev fedra vára frá ungdómi várum; teirra smáfæafylgir og teirra stórfæafylgir, teirra synir og teirra døtur.

25 Vit liggja niðri í skomm okkara, og okkar ørkymlan dekkar okkum: tí at vit hava syndað ímóti HARRANUM Guði várum, vit og fedrar várir, frá ungdómi várum enntá at hesum degi, og hava ikki lýtt rødd HARRANS Guðs várs.

KAPITUL 4

UM tú vilt venda aftur, O Ísrael, sigur HARRIN, vend aftur at mær: og um tú vilt seta burt tínar andstygdir út úr eygsjón míni, tá skalt tú ikki burtflyta.

2 Og tú skalt svørja, HARRIN livir, í sannleika, í dómi, og í rættvísi; og tjóðirnar skulu vælsigna seg sjálvar í honum, og í honum skulu tær dýrda.

3 ¶ Tí at svá sigur HARRIN til mannanna av Judah og Jerusalem, Brótið upp tykkar ósádda lendi, og sáið ei millum torna.

4 Umskerið tykkum sjálvar fyri HARRANUM, og takið burt yvirhúðir hjarta tykkara, tit menn av Judah og íbúgvar av Jerusalem: at ikki mítt ovursinni komi fram sum eldur, og brenni, at eingin kann sløkkja *tað,* uppá grund av tí illa av tykkara gerðum.

5 Lýsið tit í Judah, og kunngerið í Jerusalem; og sigið, Blásið tit lúðurin í landinum: geylið, savnið saman, og sigið, Fylkið tykkum, og latum okkum fara inn í hinar vardu staðir.

6 Setið upp hermerkið mótvegis Zion: takið *tykkum* aftur, steðgið ikki: tí at eg vil føra ilt út úr norðan, og eina mikla oyðing.

7 Leyvan er komin upp frá kjarri sínum, og oyðari Heidninganna er á veg; hann er farin fram frá sínum plássi at gera land títt oyði; *og* tínir staðir skulu verða lagdir *í* oyði, uttan íbúgva.
8 Fyri hetta gyrðið tykkum við sekkjaklæði, harmið og ýlið: tí at hin ógvusliga firtni HARRANS er ikki vend tilbakar frá okkum.
9 Og tað skal bera á á tí degi, sigur HARRIN, *at* hjartað hjá konginum skal farast, og hjartað hjá prinsunum; og prestarnir skulu ógvast, og prophetarnir skulu undrast.
10 Tá segði eg, Á, Harri GUÐ! vissuliga, tú hevurt stórliga teipað hetta fólk og Jerusalem, sigandi, Tit skulu hava frið; hvarafturímóti svørðið røkkur at sálini.
11 Á teirri tíð skal tað verða sagt til hesa fólks og til Jerusalem, Ein turrur vindur úr hinum høgu plássum í oyðuni ímóti dóttur fólks míns, ikki til at foykja, ella til at reinsa,
12 *Enntá* ein fullur vindur frá teimum *plássunum* skal koma at mær: nú eisini vil eg geva úrskurð ímóti teimum.
13 Sí, hann skal koma upp sum skýggj˙, og hansara vagnar *skulu vera* sum ein meldurvindur: hans hestar eru skjótari enn ørnir. Vei okkum! tí at vit eru rændir.
14 O Jerusalem, tváa títt hjarta frá vondsku, at tú mást verða frelst. Hvussu leingi skulu tínar fáfongdu hugsanir halda til innan í tær?
15 Tí ein rødd lýsir frá Dán, og kunnger kvøljan frá Ē´phrāīm fjalli.
16 Nevnið tit fyri tjóðunum; sí, kunngerið ímóti Jerusalem, *at* varðmenn koma frá einum fjarløgdum landi, og geva út sína rødd ímóti staðunum av Judah.
17 Eins og røkjarar av einum akri, eru teir ímóti henni runt umkring; av tí at hon hevur verið uppreistrarsom ímóti mær, sigur HARRIN.
18 Tín vegur og tínar gerðir hava útvegað hesi *ting* innat tær; hetta *er* vondska tín, av tí at hon er beisk, av tí at hon røkkur at hjarta tínum.
19 ¶ Mínar innangoymslur, mínar innangoymslur! eg eri píndur í sjálvum hjarta mínum; mítt hjarta ger eitt ljóð í mær; eg fái ikki hildið friði mínum, av tí at tú hevurt hoyrt, O sál mín, ljóðið av lúðrinum, herrópið av kríggi.
20 Oyðing omaná oyðing verður rópt; tí alt landið er rænt: brádliga eru tjøld míni rænd, *og* mínir tjalddúkar í einum eygnabragdi.
21 Hvussu leingi skal eg síggja hermerkið, *og* hoyra ljóðið av lúðrinum?
22 Tí at fólk mítt *er* fávitskut, teir hava ikki kent meg; teir *eru* tápulig børn, og teir hava einkið skil: teir *eru* vísir til at gera ilt, men til at gera gott hava teir ongan kunnleika.
23 Eg skoðaði jørðina, og sí, *hon var* uttan form, og tóm; og himnarnar, og teir *høvdu* einkið ljós.
24 Eg skoðaði fjøllini, og sí, tey nøtraðu, og allir heyggjarnir fluttu *seg* lættliga.
25 Eg leit, og sí, *har var* eingin maður, og allir himnanna fuglar vóru flýddir.
26 Eg leit, og sí, tað fruktagóða plássið *var* ein oyða, og allir staðir tess vóru brotnir niður fyri nærveru HARRANS, *og* av hansara grimmu firtni.
27 Tí at svá hevur HARRIN sagt, Alt landið skal vera oyði; tó vil eg ei gera ein fullan enda.
28 Fyri hetta skal jørðin harmast, og himnarnir uppiyvir vera svartir: av tí at eg havi talað *tað,*

eg havi avrátt *tað,* og vil ikki iðrast, eiheldur vil eg venda tilbakar frá tí.

29 Allur staðurin skal flýggja fyri ljóðið av hestmonnunum og bogamonnum; teir skulu fara inn í kjarr˘, og klúgva upp uppá klettarnar: hvør staður *skal vera* yvirgivin, og ikki maður búgva hari.

30 Og *tá ið* tú *ert* rænd, hvat vilt tú gera? Tó *at* tú klæðirt teg sjálva við fagurreyðum, tó *at* tú dekkart teg við prýðislutum av gulli, tó *at* tú skræddirt títt andlit við máling, til fánýtis skalt tú gera teg sjálva vakra; *tínir* elskarar vilja vanvirða teg, teir vilja søkja títt lív.

31 Tí at eg havi hoyrt eina rødd sum av eini kvinnu í verkjum, *og* angistina sum av henni sum ber fram sítt fyrsta barn, røddin á dóttur Zions, *sum* grætur um seg sjálva, *sum* breiðir sínar hendur, *sigandi*, Eya meg nú! tí at sál mín er mødd orsakað av myrðarum.

KAPITUL 5

RENNIÐ tit til og frá gjøgnum gøtur Jerusalems, og síggið nú, og skynið, og søkið í teimum breiðu plássunum harav, um tit kunnu finna ein mann, um tað veri *seg nakar* sum útinnir dóm, sum søkir sannleikan; og eg vil náða hann.

2 Og tó *at* teir sigi, HARRIN livir; vissuliga svørja teir falsliga.

3 O HARRI, *eru* ikki eygu tíni uppá sannleikan? tú hevurt sligið teir, men teir hava ikki harmast; tú hevurt upptært teir, *men* teir hava sýtt at taka við rættleiðing: teir hava gjørt síni andlit harðari enn ein klett; teir hava sýtt at venda aftur.

4 Tessvegna segði eg, Vissuliga, hesir *eru* armir; teir eru fávitskutir: tí at teir kenna ikki veg HARRANS, *ella* dóm Guðs síns.

5 Eg vil sleppa mær at hinum miklu monnum, og vil tala við teir; tí at teir hava kent veg HARRANS, *og* dóm Guðs síns: men hesir hava fullkomiliga brotið okið, *og* brostið bondini.

6 Av hvørji grund ein leyva úr skóginum skal bana teimum, *og* ein úlvur kvøldanna skal ræna teir, ein leopardur skal vaka yvir teirra staðum: hvør tann, ið fer út haðani, skal verða skræddur í stykkir: av tí at teirra misbrot eru mong, *og* teirra fráføll eru økt.

7 ¶ Hvussu skal eg náða teg fyri hetta? tíni børn hava yvirgivið meg, og svorið við *teir sum* eingir gudar *eru:* tá ið eg hevði føtt teir til hins fulnar, tá framdu teir hordóm, og flykkjaðu seg eftir flokkum í húsum skøkjanna.

8 Teir vóru *sum* gøddir hestar um morgunin: hvør *og* ein neggjaði eftir ektakonu næsta síns.

9 Skal eg ikki heimsøkja fyri hesi *ting?* sigur HARRIN: og skal ikki sál míni verða hevnt á eina slíka tjóð sum hesa?

10 ¶ Farið tit upp uppá hennara múrar, og oyðið; men gerið ikki fullan enda *á:* takið burt hennara rimaverk; tí at tey *eru* ikki HARRANS.

11 Tí at Ísraels hús og Judah hús hava handlað sera svikrædisligani ímóti mær, sigur HARRIN.

12 Teir hava logið út HARRAN, og sagt, *Tað er* ikki hann; eiheldur skal ilt koma uppá okkum; eiheldur skulu vit síggja svørð, ella hungursneyð:

13 Og prophetarnir skulu gerast vindur, og orðið *er* ikki í teimum: svá skal tað verða gjørt innat teimum.

14 Hvørsvegna svá sigur HARRIN Guð herliðanna, Av tí at tit tala hetta orðið, sí, eg vil gera orðini hjá mær í munninum hjá tær eld, og hetta fólkið *til* við˘, og tað skal upptæra teir.

15 Sí, eg vil føra eina tjóð omanyvir tykkum fjar*veg*is frá, O Ísraels hús, sigur HARRIN: hon *er* ein mektig tjóð, hon *er* ein fyrndar*gomul* tjóð; ein tjóð, hvørs tungumál tú kennirt ikki, eiheldur skilurt hvat teir siga.

16 Teirra ørvahúsi *er* sum eitt opið gravhýsi, teir *eru* allir mektigir menn.

17 Og teir skulu eta upp heyst títt, og breyð títt, *sum* tínir synir og tínar døtur skuldu eta: teir skulu eta upp tíni smáfæafylgir og tíni stórfæafylgir: teir skulu eta upp tíni víntrø og tíni fikutrø: teir skulu útarma tínar girdu staðir, hvará tú leitst, við svørðinum.

18 Hóast hetta, í teimum døgum, sigur HARRIN, vil eg ikki gera ein fullan enda *á* hjá tykkum.

19 ¶ Og tað skal bera á, tá ið tit skulu siga, Hvørsvegna ger HARRIN Guð vár øll hesi *ting* at okkum? tá skalt tú svara teimum, Líka sum tit hava yvirgivið meg, og tænt fremmandum gudum í landi tykkara, soleiðis skulu tit tæna fremmandum í einum landi *sum er* ikki tykkara.

20 Lýs hetta í Jákobs húsi, og kunngør tað í Judah, sigandi,

21 Hoyr nú hetta, O fávitskuta fólk, og uttan skil; sum hava eygu, og síggja ikki; sum hava oyru, og hoyra ikki:

22 Óttast tit ikki meg? sigur HARRIN: vilja tit ikki nøtra fyri nærveru míni, sum havi staðsett sandin *til* mark havsins við ein eini viðvarandi løgskipan, at hann kann ei fara yvirum tað: og tó *at* aldurnar av honum syfti seg, tó kunnu tær ei hava yvirvág; tó *at* tær ýli, tó kunnu tær ei fara yvirum tað?

23 Men hetta fólk hevur eitt frástoytandi og uppreistrarsamt hjarta; teir hava frástoytst og *eru* farnir.

24 Eiheldur siga teir í sínum hjarta, Latum okkum nú óttast HARRAN Guð váran, sum gevur regn, bæði hitt fyrra og hitt seinna, í tíð hans: hann goymir okkum hinar ásettu vikur heystsins.

25 ¶ Tykkara misgerðir hava vent burtur hesum *tingum*, og tykkara syndir hava afturhildið góð *ting* frá tykkum.

26 Tí at millum fólk mítt finnast vondir *menn:* teir liggja á lúri, eins og hann sum leggur snerrur; teir leggja eina fellu, teir fanga menn.

27 Eins og eitt búr er fult av fuglum, soleiðis *eru* hús teirra full av sviki: tí eru teir vorðnir miklir, og vaksnir ríkir.

28 Teir eru vaksnir feitir, teir skína: ja, teir fara framum gerðirnar hjá teimum vondu: teir døma ikki málið, málið hjá tí faðirleysa, tó framganga teir; og rættin hjá teimum tørvandi døma teir ikki.

29 Skal eg ikki heimsøkja fyri hesi *ting?* sigur HARRIN: skal ikki sál míni verða hevnt á eina slíka tjóð sum hesa?

30 ¶ Eitt undrunarsamt og ræðuligt ting er framt í landinum;

31 Prophetarnir prophetera falsliga, og prestarnir sita við stjórn við brøgdum sínum; og fólk mítt elska *at hava tað* soleiðis: og hvat vilja tit gera í endanum av tí?

KAPITUL 6

O TIT børn hjá Benjamin, savnið tykkum til at flýggja út úr miðjum Jerusalem, og blásið lúðurin í Tĕ́-kô-ă, og setið upp eitt elds-tekin í Bĕth-hăć-cĕrĕm: tí at ilt birtist út úr norðan, og mikil oyðing.

2 Eg havi líknað Zions dóttur við eina yndisliga og finlátiga *kvinnu*.

3 Hirðarnir við sínum smáfæafylgjum skulu koma at henni; teir skulu sláa upp *síni* tjøld ímóti

henni runt íkring; teir skulu hava á biti hvør *og* ēin í plássi sínum.

4 Fyribúgvið tit kríggj ímóti henni; reisist, og latum okkum fara niðan á hádegi. Vei okkum! tí at dagurin fer burtur, tí at kvøldar-skuggarnir eru strektir út.

5 Reisist, og latum okkum fara um nátt*ina,* og latum okkum oyðileggja hennara slottˇ.

6 ¶ Tí at svá hevur HARRI herliðanna sagt, Høggið tit niður trø, og laðið ein *virkis*garð ímóti Jerusalem: hetta *er* borgin *sum eigur* at verða heimsøkt; hon *er* heil*veg*is kúgan í miðjari sær.

7 Eins og ein kelda kastar út síni vøtn, soleiðis kastar hon út sína vondsku: harðskapur og rán hoyrist í henni; frammi fyri mær støðugt *er* harmur og sárˇ.

8 Verð tú undirvíst, O Jerusalem, at ikki mín sál víki frá tær; at ikki eg geri teg oydna, eitt land ikki búð í.

9 ¶ Svá sigur HARRI herliðanna, Teir skulu grundiga fínhenta Ísraels leivd sum eitt víntræ: vend aftur tína hond sum ein vínberjahentari inn í tægurnar.

10 Til hvørs skal eg tala, og geva ávaring, at teir mega hoyra? sí, teirra oyra *er* óumskorið, og teir kunnu ikki lýða á: sí, HARRANS orð er ein skemd at teimum; teir hava onga fragd í tí.

11 Tí eri eg fullur av ovursinni HARRANS; eg eri móður av at halda inni: eg vil hella tað út uppá børnini útumkring, og uppá savnaðin av ungmonnum tilsaman: tí at enntá ektamaðurin við ektakonuni skal verða tikin, hin aldraði við *honum sum er* mettur av døgum.

12 Og teirra hús skulu verða vend at øðrum, *við teirra* akrum og konum tilsaman: tí at eg vil strekkja út mína hond uppá íbúgvar landsins, sigur HARRIN.

13 Tí at frá hinum minsta teirra alt at tí størsta teirra *er* hvør *og* ēin givin til ágirndar; og frá prophetinum enntá at prestinum handlar hvør *og* ēin falsliga.

14 Teir hava grøtt eisini skaða *dóttur* fólks míns smávegisligani, sigandi, Friður, friður; tá ið eingin friður *er*.

15 Skammaðust teir tá ið teir høvdu framt andstygd? nei, teir skammaðust ikki yvirhøvur, eiheldur kundu teir rodna: tí skulu teir falla millum teirra sum falla: á teirri tíð, *sum* eg heimsøki teir, skulu teir verða kastaðir niður, sigur HARRIN.

16 Svá sigur HARRIN, Standið tit í vegunum, og síggið, og spyrjið eftir teimum gomlu rásunum, hvar *er* hin góði vegur, og gangið harí, og tit skulu finna hvílu fyri sálir tykkara. Men teir søgdu, Vit vilja ikki ganga *harí*.

17 Eg eisini setti varðmenn yvir tykkum, *sigandi,* Gevið gætur eftir ljóðinum av lúðrinum. Men teir søgdu, Vit vilja ikki gevur gætur.

18 ¶ Tessvegna hoyrið, tit tjóðir, og viti *tú,* O samkoma, hvat *er* teirra millum.

19 Hoyr, O jørð: sí, eg vil føra ilt uppá hetta fólk, *enntá* ávøkstirnar av teirra hugsanum, av tí at teir hava ikki givið gætur at orðum mínum, ella eftir lóg míni, men vrakað tað.

20 Fyri hvat endamál kemur tað til mín roykilsi frá Sjē´-bā, og tað søta sukurrørið frá einum fjarløgdum landi? tykkara brennioffur *eru* ikki góðtakilig, ella tykkara sláturoffur søt yvirfyri mær.

21 Tessvegna, svá sigur HARRIN, Sí, eg vil leggja snávingarsteinar frammi fyri hesum fólki, og fedrarnir og synirnir tilsaman skulu falla uppá teir; grannin og hansara vinur skulu týnast.

22 Svá sigur HARRIN, Sí, eitt fólk kemur frá norður landinum, og ein mikil tjóð skal verða reist frá síðum jarðarinnar.

23 Teir skulu leggja hald á boga og spjót; teir *eru* grimmir, og hava onga miskunn; teirra rødd ýlir líka *sum* sjógvurin; og teir ríða uppiá hestum, settir í uppstilling sum menn til kríggj ímóti tær, O Zions dóttir.

24 Vit hava hoyrt tess giti: okkara hendur vaksa máttleysar: angist hevur tikið hald á okkum, *og* pína, sum hjá eini kvinnu í verkjum.

25 Far ikki fram á akurin, ella gakk eftir veginum; tí at figgindans svørð *og* ótti *er* á hvørjari síðu.

26 ¶ O dóttir fólks míns, gyrð *teg* við sekkjaklæði, og velt tær í øskum: ger tær syrging, *sum fyri* ein ēinasta son, mest beiska harming: tí at rænarin skal brádliga koma uppá okkum.

27 Eg havi sett teg *til* eitt torn *og* ein festning millum fólk mítt, at tú mást kenna og royna teirra veg.

28 Teir *eru* allir herviligir frástoytarar, gangandi við sleygum: *teir eru* messing og jarn; teir *eru* allir spillarar.

29 Bjølgarnir eru brendir, blýggið er upptært av eldinum; stoyparin smeltar til fánýtis: tí at hinir vondu eru ei slitnir burtur.

30 Afturkastiligt silvur skulu *menn* kalla teir, av tí at HARRIN hevur havnað teimum.

KAPITUL 7

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah frá HARRANUM, sigandi,

2 Statt í portrinum av HARRANS húsi, og kunnger har hetta orðið, og sig, Hoyrið HARRANS orð, allir *tit av* Judah, sum innfara inn við hesi portur at tilbiðja HARRAN.

3 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels, bøtið um tykkara vegir og tykkara gerðir, og eg vil elva tykkum at búgva í hesum plássi.

4 Lítið tit ikki á lúgvandi orð˘, sigandi, Tempul HARRANS, Tempul HARRANS, Tempul HARRANS, *eru* hesi.

5 Tí at um tit grundiga bøti um tykkara vegir og tykkara gerðir; um tit grundiga útinni dóm ímillum ein mann og hansara næsta;

6 *Um* tit kúgi ikki hin fremmanda, hin faðirleysa, og einkjuna, og úthelli ikki sakleyst blóð í hesum plássi, eiheldur gangi eftir øðrum gudum til tykkara mein:

7 Tá vil eg elva tykkum at búgva í hesum plássi, í landinum sum eg gav til tykkara fedrar, um ævir og ævir.

8 ¶ Sí, tit líta á lúgvandi orð˘, sum kunnu ikki gagna.

9 Vilja tit stjala, myrða, og fremja hordóm, og svørja falsliga, og brenna roykilsi at Bā´ăl-i, og ganga eftir øðrum gudum, hvørjar tit kenna ei;

10 Og koma og standa frammi fyri mær í hesum húsi, sum er kallað við navni mínum, og siga, Vit eru bjargaðir til at gera allar hesar andstygdir?

11 Er hetta hús, sum er kallað við navni mínum, vorðið eitt ránsmannabøli í eygum tykkara? Sí, enntá eg havi sæð *tað,* sigur HARRIN.

12 Men farið tit nú at plássi mínum, sum *var* í Sjï´lôh, har eg setti mítt navn í fyrstani, og síggið hvat eg gjørdi við tað fyri vondskuna hjá fólki mínum Ísrael.

13 Og nú, av tí at tit hava gjørt øll hesi verk, sigur HARRIN, og eg talaði við tykkum, rísandi upp árla og talandi, men tit hoyrdu ikki; og eg kallaði tykkum, men tit svaraðu ikki;

14 Tí vil eg gera innat *hesum* húsi, sum er kallað við navni mínum, hvará tit líta, og innat

plássinum sum eg gav til tykkara og til tykkara fedrar, eins og eg havi gjørt við Sjï´-lôh.

15 Og eg vil kasta tykkum út úr eygsjón míni, eins og eg havi kastað út allar tykkara brøður, *enntá* alt Ē´-phră-ĭm-s sáð.

16 Tessvegna bið ikki tú fyri hesum fólki, eiheldur lyft upp róp ella bøn fyri teimum, eiheldur ger forbøn til mín: tí at eg vil ikki hoyra teg.

17 ¶ Sært tú ikki hvat teir gera í staðunum av Judah og í gøtum Jerusalems?

18 Børnini savna viðˇ, og fedrarnir kynda eldin, og kvinnurnar knoða deiggj *sitt,* til at gera køkur til himinsdrotningina, og at hella út drykkoffurˇ at øðrum gudum, at teir mega tirra meg til firtnis.

19 Tirra teir meg til firtnis? sigur HARRIN: *tirra teir* ikki seg sjálvar til ørkymlingina av sínum egnu andlitum?

20 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, mín firtni og mín øði skal verða helt út omanyvir hetta plass, omanyvir mann, omanyvir djór, og omanyvir trø akursins, og omanyvir grøði lendisins; og tað skal brenna, og skal ei verða sløkt.

21 ¶ Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Setið tykkara brennioffurˇ afturat tykkara sláturofrum, og etið kjøt.

22 Tí at eg talaði ikki við tykkara fedrar, ella ábjóðaði teimum á tí degi sum eg førdi teir út úr Egyptalandi, viðvíkjandi brenniofrum ella sláturofrum:

23 Men hetta tingið ábjóðaði eg teimum, sigandi, Lýðið rødd mína, og eg vil vera Guð tykkara, og tit skulu vera fólk mítt: og gangið tit í øllum vegunum sum eg havi áboðið tykkum, at tað má vera væl *statt* hjá tykkum.

24 Men teir góvu ikki gætur, ella boygdu oyra sítt, men gingu í ráðum *og* í ímyndanum illa hjarta síns, og fóru aftureftir, og ikki frameftir.

25 Síðan tann dag sum tykkara fedrar komu fram út úr Egyptalandi, at hesum degi, havi eg enntá sent at tykkum allar mínar tænarar — prophetarnar, dagliga rísandi upp árla og sendandi *teir:*

26 Tó góvu teir ikki gætur at mær, ella boygdu oyra sítt, men herdu svíra sín: teir gjørdu verri enn sínir fedrar.

27 Tí skalt tú tala øll hesi orð við teir; men teir vilja ikki lurta eftir tær: tú skalt eisini kalla at teimum; men teir vilja ikki svara tær.

28 Men tú skalt siga við teir, Hetta *er* ein tjóð sum lýðir ikki rødd HARRANS Guðs síns, ella tekur við rættleiðing: sannleiki er týndur, og er skorin av frá munni teirra.

29 ¶ Sker av hár títt, *O Jerusalem,* og kasta *tað* burtur, og tak upp eina harman á høgum plássum; tí at HARRIN hevur havnað og yvirgivið ætt vreiði sínar.

30 Tí at Judah børn hava gjørt ilt í eygsjón míni, sigur HARRIN: teir hava sett sínar andstygdir í húsinum sum er kallað við navni mínum, at óreinka tað.

31 Og teir hava bygt hini høgu pláss Tō´-phĕt-s, sum *er* í dali Hĭn´-nōm-s sonar, at brenna sínar synir og sínar døtur í eldinum; hvørt eg ábeyð *teim* ikki, eiheldur kom tað inn í mítt hjarta.

32 ¶ Tessvegna, sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at hann skal ei meira verða kallaður Tō´-phĕt, ella dalur Hĭn´-nōm-s sonar, men dalur slátranarinnar: tí at teir skulu jarða í Tō´-phĕt, til har verði einkið pláss.

33 Og ræini av hesum fólki skulu vera matur til fuglar himinsins, og til djórˇ jarðarinnar; og eingin skal styggja *tey* burt.

34 Tá vil eg fáa at halda uppat frá staðunum av Judah, og frá gøtum Jerusalems, røddina av kæti, og røddina av gleði, røddina á brúðgóminum, og røddina á brúðrini: tí at landið skal vera oyði.

KAPITUL 8

Á TEIRRI tíð, sigur HARRIN, skulu teir bera út beinini av kongunum av Judah, og beinini av prinsum hans, og beinini av prestunum, og beinini av prophetunum, og beinini av íbúgvum Jerusalems, út úr grøvum teirra:

2 Og teir skulu breiða tey framfyri sólina, og mánan, og alt herlið himins, hvørji teir hava elskað, og hvørjum teir hava tænt, og eftir hvørjum teir hava gingið, og hvørji teir hava søkt, og hvørji teir hava tilbiðið: teir skulu ei verða savnaðir, ella verða jarðaðir; teir skulu vera til tað uppiá ásjón jarðarinnar.

3 Og deyði skal verða valdur heldur enn lív av øllum avlopinum av teimum sum eru verandi av hesi óndu familju; sum eru verandi í øllum plássunum, hvagar eg havi rikið teir, sigur HARRI herliðanna.

4 ¶ Harafturat skalt tú siga við teir, Svá sigur HARRIN; Skulu teir falla, og ikki reisast? skal hann venda burtur, og ei venda aftur?

5 Hví er hetta fólk Jerusalems *tá* fráfallið við einum viðvarandi fráfalli? teir halda fast *við* svik, teir sýta at venda aftur.

6 Eg lýddi á og hoyrdi, *men* teir talaðu ikki á rættan *hátt:* eingin maður iðraði seg um sína vondsku, sigandi, Hvat havi eg gjørt? hvør *og* ēin vendi til skeið sítt, sum hesturin stormar inn í bardagan.

7 Ja, storkurin í himninum kennir sínar ásettu tíðir; og turtildúgvan og tranin og svalan geva ans eftir tíðini av síni komu; men fólk mítt kenna ikki dóm HARRANS.

8 Hvussu siga tit, Vit *eru* vísir, og HARRANS lóg *er* hjá okkum? Sí, vissuliga, til fánýtis gjørdi hann *hana;* pennur hinna skriftlærdu *er* til fánýtis.

9 Hinir vísu *menn* skammast, teir eru mótfalnir og tiknir: sí, teir hava havnað orði HARRANS; og hvør vísdómur *er* í teimum?

10 Tí vil eg geva teirra konur at øðrum, *og* teirra akrar til teirra sum skulu arva *teir:* tí at hvør *og* ēin, frá hinum minsta alt at tí miklasta, er givin til ágirndar; frá prophetinum enntá at prestinum, hvør *og* ēin handlar falsliga.

11 Tí at teir hava grøtt skaða dóttur fólks míns smávegisligani, sigandi, Friður, friður; tá ið eingin friður *er.*

12 Skammaðust teir tá ið teir høvdu framt andstygd? nei, teir skammaðust ikki yvirhøvur, eiheldur kundu teir rodna: tí skulu teir falla millum teirra sum falla: á tíðini av síni heimsókn skulu teir verða kastaðir niður, sigur HARRIN.

13 ¶ Eg vil vissuliga upptæra teir, sigur HARRIN: *tað skulu* ongar víndrúvur *vera* á víntræinum, ella fikur á fikutræinum, og leyvið skal følna; og *tey tingini, sum* eg havi givið teimum, skulu fara burtur frá teimum.

14 Hví sita vit stillir? savnið tykkum saman, og latum okkum innfara inn í hinar vardu staðir, og latum okkum vera tigandi har: tí at HARRIN Guð okkara hevur sett okkum til tagnar, og givið okkum vatn av galli at drekka, av tí at vit hava syndað ímóti HARRANUM.

15 Vit væntaðu eftir friði, men einkið gott *kom;og* eftir eini tíð av heilsu, og sí órógv!

16 Froysingin av hansara hestum varð hoyrd frá Dán: alt landið skalv við ljóðið av neggingini av

hinum sterku hansara; tí at teir eru komnir, og hava uppslúkað landið, og alt sum er í tí; staðin, og teir sum búgva harí.

17 Tí at sí, eg vil senda høggormar, basiliskar, tykkara millum, sum *vilja* ikki *verða* gandakvøddir, og teir skulu bíta tykkum, sigur HARRIN.

18 ¶ *Tá ið* eg vildi ugga meg sjálvan ímóti sorg, *er* hjarta mítt kámt í mær.

19 Sí røddina á ropinum hjá dóttur fólks míns orsakað av teimum sum búgva í einum fjarløgdum landi: *Er* ikki HARRIN í Zion? *er* ikki hennara kongur í henni? Hví hava teir tirrað meg til firtnis við sínum ristu myndum, *og* við fremmandum fáfongdum?

20 Heystið er liðið, summarið er endað, og vit eru ikki frelstir.

21 Fyri skaða dóttur fólks míns eri eg skaddur; eg eri svartur; øtan hevur tikið hald á mær.

22 *Er* einkið balsam í Gilead; *er* eingin lækni har? hví er tá ikki heilsa dóttur fólks míns komin aftur fyri seg?

KAPITUL 9

Á, at mítt høvd var vøtn, og míni eygu ein kelda av tárum, at eg mátti grátið dag og nátt fyri hinar vignu hjá dóttur fólks míns!

2 Á, at eg hevði í oyðuni eitt tilhalds stað hjá vegfarandi monnum; at eg mátti eftirlatið fólk mítt, og farið frá teimum! tí at teir *veri* allir hordómsfremjarar, ein savnaður av svikræðisligum monnum.

3 Og teir spenna sínar tungur *sum* sínar bogar *til* lygnir: men teir eru ikki reystir fyri sannleikan uppiá jørðini; tí at teir ganga frameftir frá illum til ilt, og teir kenna ikki meg, sigur HARRIN.

4 Veitið tit varni hvør *og* ēin fyri næsta sínum, og lítið tit ikki á nakran bróður: tí at hvør bróðir vil aldeilis narra, og hvør næsti vil ganga við sleygum.

5 Og teir vilja villleiða hvør *og* ēin næsta sín, og vilja ikki tala sannleikan: teir hava lært sína tungu at tala lygnir, *og* møða seg sjálvar at fremja misgerð.

6 Títt býli *er* í miðjum sviki; ígjøgnum svik sýta teir at kenna meg, sigur HARRIN.

7 Tessvegna, svá sigur HARRI herliðanna, Sí, eg vil smelta teir, og royna teir; tí at hvussu skal eg gera fyri dóttur fólks míns?

8 Teirra tunga *er sum* ein ørv skotin út; hon talar svik: *ēin* talar friðsamliga til sín næsta við sínum munni, men í hjarta liggur hann *á* lúri sínum.

9 ¶ Skal eg ikki heimsøkja teir fyri hesi *ting?* sigur HARRIN: skal ikki sál míni verða hevnt á eina slíka tjóð sum hesa?

10 Yvir fjøllini vil eg taka upp eina grátan og venan, og yvir íbúgvar oyðunnar eina harman, av tí at tey eru brend upp, so at eingin kann fara ígjøgnum *tey;* eiheldur kunnu *menn* hoyra røddina á fenaðinum; bæði fuglur himnanna og djórið eru flýdd; tey eru farin.

11 Og eg vil gera Jerusalem *til* rúgvur, *og* eitt bøli hjá drekum; og eg vil gera staðirnar av Judah oydnar, uttan íbúgva.

12 ¶ Hvør *er* hin vísi maður, sum kann skilja hetta? og *hvør er hann,* til hvørs munnur HARRANS hevur talað, at hann kann kunngera tað, fyri hvat landið ferst *og* er brent upp sum ein oyða, at eingin fer ígjøgn?

13 Og HARRIN sigur, Av tí at teir hava yvirgivið mína lóg, sum eg setti framfyri teir, og hava ikki lýtt mína rødd, eiheldur gingið harí;

14 Men hava gingið eftir ímyndan egna hjarta síns, og eftir Bā'-ă-līm, hvørt teirra fedrar lærdu teir:

15 Tessvegna, svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil mata teir, *enntá* hetta fólk, við malurt, og geva teimum vatn av galli at drekka.

16 Eg vil spjaða teir eisini hinna heidnu millum, hvørjar hvørki teir ella teirra fedrar hava kent: og eg vil senda eitt svørð eftir teimum, til eg havi upptært teir.

17 ¶ Svá sigur HARRI herliðanna, Umhugsið tit, og kallið eftir harmingar kvinnunum, at tær mega koma; og sendið eftir hegnigum *kvinnum,* at tær mega koma:

18 Og lat tær gera skjótt, og taka upp eina venan fyri okkum, at vári eygu mega renna niður við tárum, og várar eygnalokur gjósa út við vøtnum.

19 Tí ein rødd av venan er hoyrd út úr Zion, Hvør eru vit rændir! vit eru stórliga fjamskaðir, av tí at vit hava yvirgivið landið, av tí at okkara bústaðir hava kastað *okkum* út.

20 Tó hoyrið orð HARRANS, O tit kvinnur, og latið tykkara oyra móttaka orðið av hansara munni, og lærið tykkara døtur venan, og hvør *og* ēin næsta sín harman.

21 Tí at deyði er komin upp í gluggar várar, *og* er innfarin inn í slott vári, at avskera børnini frá *at vera* fyri uttan, *og* hinar ungu menn frá gøtunum.

22 Tala, Svá sigur HARRIN, Enntá ræini av monnum skulu falla sum tað uppá hin opna akur, og sum krumman eftir heystingarmannin, og eingin skal savna *tey*.

23 ¶ Svá sigur HARRIN, Lat ikki vís*mann*in dýrda í sínum vísdómi, eiheldur lat hin mektiga *mann* dýrda í sínum mátti, lat ikki rík*mann*in dýrda í sínum ríkdómum:

24 Men lat hann, sum dýrdar, dýrda í hesum, at hann skilur og kennir meg, at eg *eri* HARRIN, sum íðki elskandi blídni, dóm, og rættvísi, á jørðini: tí at í hesum *tingum* fragdist eg, sigur HARRIN.

25 ¶ Sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at eg vil revsa allar *teir, sum eru* umskornir, við hinum óumskornu;

26 Egyptaland, og Judah, og Ē´dóm, og børn Ammons, og Móab, og allar *sum eru* í teimum ytstu úthornunum, sum búgva í oyðuni: tí at allar *hesar* tjóðir *eru* óumskornar, og alt hús Ísraels *eru* óumskornir í hjartanum.

KAPITUL 10

HOYRIÐ tit orðið, sum HARRIN talar við tykkum, O Ísraels hús:

2 Svá sigur HARRIN, Lærið ikki veg teirra heidnu, og verið ikki mótfalnir yvirfyri teknum himins; tí hinir heidnu eru mótfalnir yvirfyri teimum.

3 Tí at skikkir fólksins *eru* fáfongdir: tí at *ēin* sker eitt træ út úr skóginum, verkið av hondum verkamansins, við øksini.

4 Teir dekka tað við silvuri og við gulli; teir festa tað við naglum og við hamarum, at tað flyti ikki.

5 Tey *eru* steyrrøtt sum pálmatræið, men tala ikki: tey mugu neyðugt verða borin, av tí at tey kunnu ikki ganga. Verið ikki ræddir fyri teimum; tí at tey kunnu ei gera ilt, eiheldur eisini *er tað* í teimum at gera gott.

6 Við tað at *tað er* eingin líkur tær, O HARRI; tú *ert* mikil, og navn títt *er* mikið í mátti.

7 Hvør vildi ikki óttast teg, O Kong av tjóðum? tí at til tín tað tilhoyrir: so mikið sum at millum alra vís*manna* tjóðanna, og í øllum teirra kongadømum, *er* eingin líkur tær.

8 Men teir eru aldeilis óskynskir og fávitskutir: stamman *er* ein Guðslæra av fáfongdum.

9 Silvur, breitt yvirí plátur, verður ført frá Tarsjisj, og gull frá Ú′-phăz, verkið hjá verkamanninum, og av hondum stoyparans: blátt og purpur *er* klædnaður teirra: tey *eru* øll verkið hjá hegnigum *monnum*.

10 Men HARRIN *er* hin sanni Guð, hann *er* hin livandi Guð, og ein ævigtvarandi kongur: fyri hansara vreiði skal jørðin nøtra, og tjóðirnar skulu ikki vera førar fyri at viðhalda hansara harmavreiði.

11 Svá skulu tit siga við teir, Teir gudar, sum ikki hava gjørt himnarnar og jørðina, *enntá* teir skulu týnast frá jørðini, og undan hesum himnum.

12 Hann hevur gjørt jørðina við^ síni kraft, hann hevur grundfest verøldina við^ sínum vísdómi, og hevur strekt út himnarnar við^ síni hygni.

13 Tá ið hann mælir rødd síni, *er* ein fjøld av vøtnum í himnunum, og hann elvir guvunum at stíga upp frá endum jarðarinnar; hann ger snarljós^ við regni, og førir fram vindin úr goymslum sínum.

14 Hvør maður er óskynskur í *sínum* kunnleika: hvør stoypari er fjamskaður av hini ristu mynd: tí at hansara brædda mynd *er* fals, og *tað er* eingin andadráttur í teimum.

15 Tær *eru* fáfongd, *og* verkið av villfaringum: á tíðini av teirra heimsókn skulu tær týnast.

16 Skamtur Jákobs *er* ikki sum tær: tí at hann *er* myndarin av øllum *tingum;* og Ísrael *er* stavur arvs hansara: HARRI herliðanna *er* navn hans.

17 ¶ Savna upp tínar vørur burtur úr landinum, O íbúgvi av festninginum.

18 Tí at svá sigur HARRIN, Sí, eg vil sleingja út íbúgvar landsins á hesum sinni, og vil treingja teir, at teir mega finna *tað soleiðis*.

19 ¶ Eya meg fyri skaða mín! sár mítt er herviligt: men eg segði, Sanniliga, hetta *er* ein harmur, og eg má bera tað.

20 Mítt tabernakkul er herjað, og øll míni bond eru slitin: míni børn eru farin fram út úr mær, og tey *eru* ei: *tað er* eingin at tenja fram tjald mítt meira, og at seta upp mínar tjalddúkar.

21 Tí at hirðarnir eru vorðnir óskynskir, og hava ikki søkt HARRAN: tí skulu teir ikki framganga, og øll teirra fylgir skulu verða spjødd.

22 Sí, ljóðið av fregnini er komið, og eitt mikið ófriðarlæti úr norður landinum, at gera staðirnar av Judah oydnar, *og* eitt bøli hjá drekum.

23 ¶ O HARRI, eg veit at vegurin hjá manni *er* ikki í sjálvum honum: *tað er* ikki í manni, sum gongur, at beina síni fet.

24 O HARRI, rættleið meg, men við dómi; ikki í tíni firtni, at ikki tú føri meg til einkiðs.

25 Stoyt út tína øði uppá hinar heidnu sum kenna teg ikki, og uppá familjurnar sum kalla ikki á navn títt: tí at teir hava etið upp Jákob, og gloypt hann, og upptært hann, og hava gjørt hansara býli oyði.

KAPITUL 11

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah frá HARRANUM, sigandi,

2 Hoyrið tit orðini av hesum sáttmála, og talið við menninar av Judah, og til íbúgvanna av Jerusalem;

3 Og sig tú við teir, Svá sigur HARRIN Guð Ísraels; Bannaður *veri* tann maður sum lýðir ikki orðini av hesum sáttmála,

4 Sum eg ábeyð tykkara fedrum á tí degi *sum* eg førdi teir fram út úr Egyptalandi, frá jarn-ovninum, sigandi, Lýðið mína rødd, og gerið tey, samsvarandi við alt sum eg

ábjóði tykkum: so skulu tit vera fólk mítt, og eg vil vera Guð tykkara:

5 At eg má útinna eiðin sum eg havi svorið tykkara fedrum, at geva teimum eitt land — fløðandi við mjólk og hunangi, eins og *tað er* henda dag. Tá svaraði eg, og segði, Soleiðis veri tað, O HARRI.

6 Tá segði HARRIN við meg, Kunngger øll hesi orð í staðunum av Judah, og í gøtum Jerusalems, sigandi, Hoyrið tit orðini av hesum sáttmála, og gerið tey.

7 Tí at eg inntreingjandi fastsló at tykkara fedrum á tí degi *sum* eg førdi teir upp út úr Egyptalandi, *enntá* at hesum degi, risandi árla og fastsláandi, sigandi, Lýðið rødd mína.

8 Tó lýddu teir ikki, ella bendu oyra sítt, men gingu hvør *og* ēin í ímyndan illa hjarta síns: tí vil eg føra uppá teir øll orðini av hesum sáttmála, sum eg ábjóðaði *teimum* at gera; men teir gjørdu *tey* ikki.

9 Og HARRIN segði við meg, Ein samansvørjing er funnin millum Judah manna, og millum íbúgvaˇ Jerusalems.

10 Teir eru vendir tilbakar til misgerðirnar hjá sínum forfedrum, sum sýttu at hoyra míni orð; og teir fóru eftir øðrum gudum at tæna teimum: Ísraels hús og Judah hús hava brotið mín sáttmála sum eg gjørdi við teirra fedrar.

11 ¶ Tessvegna, svá sigur HARRIN, Sí, eg vil føra ilt omanyvir teir, sum teir skulu ikki vera førir fyri at komast undan; og tó *at* teir skulu rópa á meg, vil eg ikki lýða á teir.

12 Tá skulu staðirnir av Judah og íbúgvarnir av Jerusalem fara, og rópa á gudarnar, at hvørjum teir ofra roykilsi: men teir skulu ikki frelsa teir yvirhøvur í tíðini av teirra trongd.

13 Tí at *samsvarandi við* talið á tínum staðum vóru gudar tínir, O Judah; og *samsvarandi við* talið á gøtunum av Jerusalem hava tit sett upp altarˇ fyri *hasum* skammfulla tingi, *enntá* altarˇ til at brenna roykilsi at Bā′-ăl-i.

14 Tessvegna bið ikki tú fyri hesum fólki, eiheldur lyft upp eitt róp, ella bøn, fyri teimum: tí at eg vil ikki hoyra *teir* í tíðini sum teir rópa á meg yvir sína trongd.

15 Hvat hevur mín háttelskaða at gera í húsi mínum, *eftirsum at* hon hevur virkað skammloysi við mongum, og hitt heilaga kjøt er farið frá tær? tá ið tú gert ilt, tá fegnarst tú.

16 HARRIN kallaði títt navn, Eitt grønt olivintræ, vakurt, *og* av frálíkum ávøksti: við ljóðinum av einum miklum ófriðarlæti hevur hann kynt eld uppiá tí, og greinarnar á tí eru brotnar.

17 Tí at HARRI herliðanna, sum plantaði teg, hevur lýst ilt ímóti tær, fyri tað illa hjá húsi Ísraels og hjá húsi Judah, sum teir hava gjørt ímóti sær sjálvum til at tirra meg til firtnis í at ofra roykilsi at Bā′-ăl-i.

18 ¶ Og HARRIN hevur givið mær kunnleika *um tað,* og eg veit *tað:* tá sýndirt tú mær teirra gerðir.

19 Men eg *var* líka *sum* eitt lamb *ella* ein oksi *sum* er førdur til slátringina; og eg vitsti ikki, at teir høvdu upphugsað snildarráðˇ ímóti mær, *sigandi,* Latum okkum oyða træið við ávøksti tess, og latum okkum skera hann av frá landi teirra livandi, at hansara navn má verða ei meira mint.

20 Men, O HARRI herliðanna, sum dømirt rættvísiliga, sum roynirt nýruni og hjartað, lat meg sjá tína hevnd á teir: tí innat tær havi eg opinberað mína søk.

21 Tessvegna, svá sigur HARRIN um menninar av An′-ă-thōth, sum

søkja títt lív, sigandi, Prophetera ikki í navni HARRANS, at tú doyggi ikki við okkara hond:

22 Tessvegna, svá sigur HARRI herliðanna, Sí, eg vil revsa teir: teir ungu menninir skulu doyggja við svørðinum; teirra synir og teirra døtur skulu doyggja við hungursneyð:

23 Og tað skal eingin leivd vera av teimum: tí at eg vil føra ilt omanyvir menninar av Án-ă-thōth, *enntá* árið av teirra heimsøking.

KAPITUL 12

RÆTTVÍSUR *ert* tú, O HARRI, tá ið eg føri søk við teg: tó lat meg tala við teg um dómar *tínar:* Hvørsvegna blómar vegur teirra vondu? *hvørsvegna* eru allir teir glaðir sum handla sera svikræðisliga?

2 Tú hevurt plantað teir, ja, teir hava sligið rót: teir vaksa, ja, teir bera fram ávøkst: tú *ert* nær í teirra munni, og fjart frá teirra nýrum.

3 Men tú, O HARRI, kennirt meg: tú hevurt sæð meg, og roynt mítt hjarta mótvegis tær: hála teir út eins og seyð til slátringina, og fyribúgv teir til slátranar dagin.

4 Hvussu leingi skal landið harma, og urtirnar hjá hvørjum akri følna, fyri vondskuna hjá teimum ið búgva harí? djórini eru upptærd, og fuglarnir; av tí at teir søgdu, Hann skal ei síggja okkara síðsta enda.

5 ¶ Um tú hevurt runnið við fótmonnunum, og teir hava møtt teg, hvussu kanst tú tá stríðast við hestar? og *um* í landi friðarins, *hvará* tú leitst, *teir møddu teg,* hvussu vilt tú tá klára *teg* í bólgnan Jordans?

6 Tí at sjálvt tínir brøður, og faðirs tíns hús, sjálvt teir hava farið sera sviksamliga við tær; ja, teir hava kallað eina fjøld eftir tær: trúgv teimum ikki, tó *at* teir tali føgur orð við teg.

7 ¶ Eg havi yvirgivið hús mítt, eg havi eftirlatið mín arvalut; eg havi givið hina kærliga háttelskaðu sálar mínar inn í hondina á hennara figgindum.

8 Mín arvalutur er mær sum ein leyva í skóginum; hann geylar út ímóti mær: tí havi eg hatað hann.

9 Mín arvalutur *er* mær *sum* ein flekkutur fuglur, fuglarnir runt umkring *eru* ímóti honum; komið tit, flykkið øll akursins djór, komið at uppgloypa.

10 Nógvir hirðar hava oytt víngarð mín, teir hava traðkað mín skamt undir fót, teir hava gjørt mín yndisliga skamt *til* eina oydna oyðu.

11 Teir hava gjørt hann oydnan, *og, verandi* oyðin, harmast hann yvirfyri mær; alt landið er gjørt oyði, av tí at eingin maður tekur *tað* til hjarta.

12 Rænararnir eru komnir uppá øll høg pláss ígjøgnum oyðuna: tí at svørð HARRANS skal uppgloypa frá tí *ēina* enda landsins enntá til *hīn* enda landsins: einkið kjøt skal hava frið.

13 Teir hava sáað hveiti, men skulu heysta tornir: teir hava sett seg sjálvar til pínu, *men* skulu ikki gagna: og teir skulu skammast um tykkara innløgur orsakað av hini grimmu firtni HARRANS.

14 ¶ Svá sigur HARRIN ímóti øllum mínum óndu grannum, sum nema við arvin sum eg havi volt mínum fólki Ísrael at arva; Sí, eg vil slíta teir úr teirra landi, og slíta út Judah hús frá teirra millum.

15 Og tað skal bera á, eftir at eg havi slitið teir út, vil eg venda aftur, og hava várkunn á teir, og vil føra teir aftur, hvønn mann til arvs hansara, og hvønn mann til lands hansara.

16 Og tað skal bera á, um teir

vilji dúgliga læra vegir fólks míns, at svørja við navn mítt, HARRIN livir; eins og teir lærdu fólk mítt at svørja við Bá'-ál; tá skulu teir verða bygdir í miðjum fólki mínum.

17 Men um teir vilji ikki lýða, vil eg aldeilis slíta upp og oyða ta tjóð, sigur HARRIN.

KAPITUL 13

SVÁ sigur HARRIN við meg, Far og skaffa tær ein lín gyrðil, og koyr hann uppá lendar tínar, og koyr hann ikki í vatn.

2 So eg skaffaði ein gyrðil, samsvarandi við orð HARRANS, og koyrdi *hann* á lendar mínar.

3 Og HARRANS orð kom at mær aðru ferðina, sigandi,

4 Tak gyrðilin sum tú hevurt skaffað, sum *er* uppiá lendum tínum, og reis *teg*, far til Ĕv-phrā'-tēs, og fjal hann har í eini holu klettarins.

5 So eg fór, og fjaldi hann hjá Ĕv-phrā'-tēs, sum HARRIN ábjóðaði mær.

6 Og tað bar á aftaná mangar dagar, at HARRIN segði við meg, Reis *teg*, far til Ĕv-phrā'-tēs, og tak gyrðilin haðani frá, sum eg ábjóðaði tær at fjala har.

7 Tá fór eg til Ĕv-phrā'-tēs, og gróv, og tók gyrðilin frá plássinum har eg hevði fjalt hann: og sí, gyrðilin var skemdur, hann dugdi ikki til nakað.

8 Tá kom orð HARRANS at mær, sigandi,

9 Svá sigur HARRIN, Eftir hesum háttarlagi vil eg skemma hugmóðina hjá Judah, og hina miklu hugmóð Jerusalems.

10 Hetta ónda fólk, sum sýta at hoyra míni orð, sum ganga í ímyndan hjarta síns, og ganga eftir øðrum gudum, til at tæna teimum, og at tilbiðja teir, skal enntá verða sum hesin gyrðilin, sum er ikki góður til nakað.

11 Tí at eins og gyrðilin krøkist til lendarnar á einum manni, soleiðis havi eg volt at krøkjast at mær heila hús Ísraels og heila hús Judah, sigur HARRIN; at teir máttu vera mær til eitt fólk, og til eitt navn, og til lovs, og til eina dýrd: men teir vildu ikki hoyra.

12 ¶ Tí skalt tú tala við teir hetta orðið; Svá sigur HARRIN Guð Ísraels, Hvør fløska skal verða fylt við víni: og teir skulu siga við teg, Vita vit ikki vissuliga, at hvør fløska skal verða fylt við víni?

13 Tá skalt tú siga við teir, Svá sigur HARRIN, Sí, eg vil fylla allar íbúgvarnar av hesum landi, enntá kongarnar sum sita uppiá hásæti Dávids, og prestarnar, og prophetarnar, og allar íbúgvarnar av Jerusalem, við fyllskapi.

14 Og eg vil smekka teir ēin ímóti øðrum, enntá fedrarnar og synirnar tilsaman, sigur HARRIN: eg vil ikki taka synd í, ella eira, ella hava miskunn, men oyða teir.

15 ¶ Hoyrið tit, og lænið oyra; verið ikki hugmóðigir: tí at HARRIN hevur talað.

16 Gevið dýrd til HARRANS Guðs tykkara, áðrenn hann voldi myrkur, og áðrenn tykkara føtur snávi uppiá hinum myrku fjøllum, og, meðan tit vænta eftir ljósi, hann snúgvi tí yvirí skugga deyðans, *og* geri *tað til* tjúkt myrkur.

17 Men um tit vilji ikki hoyra tað, skal sál mín gráta í loyndum plássum fyri *tykkara* hugmóð; og mítt eyga skal gráta sáran, og renna niður við tárum, av tí at HARRANS fylgi verður borið burt *til* fanga.

18 Sig við kongin og til drotningina, Eyðmýkið tykkum, setist niður: tí at tykkara fúrstadømir skulu koma niður, *sjálvt* krúnan av tykkara dýrd.

19 Suðursins staðir skulu verða

lokaðir fyri, og eingin skal opna *teir:* Judah skal verða borið burtur *til* fanga alt samalt, tað skal verða heil*veg*is borið burt *til* fanga.

20 Lyftið upp eygum tykkara, og skoðið teir sum koma úr norðan: hvar *er* fylgið *sum* varð givið tær, títt vakra fylgi?

21 Hvat vilt tú siga tá ið hann skal revsa teg? tí at tú hevurt lært teir *at vera* høvuðsmenn, *og* sum fremstar yvir tær: skulu ikki sorgir taka teg, sum eina kvinnu í verkjum?

22 ¶ Og um tú sigi í hjarta tínum, Hvørsvegna komu hesir lutir omanyvir meg? Fyri mikilleikan av tíni misgerð eru tíni skeytir avdekkaði, *og* tínir hælir gjørdir berir.

23 Kann Ê-thï-ō´-pï-arin broyta sína húð, ella leopardurin sínar flekkir? *so* mega tit eisini gera gott, sum eru vanir at gera ilt.

24 Tí vil eg spjaða teir sum hálmin, sum fer burtur viðˆ vindi oyðunnar.

25 Hetta *er* lutur tín, skamturin av tínum mátum frá mær, sigur HARRIN; av tí at tú hevurt gloymt meg, og litið á fals.

26 Tí vil eg avdekka tíni skeytir uppá títt andlit, at tín skomm má birtast.

27 Eg havi sæð tínar hordómar, og tínar neggjanir, ólátaskapin av tínum hordómi, *og* tínar andstygdir á heyggjunum í akrunum. Vei tær, O Jerusalem! vilt tú ikki verða gjørd rein? nær *skal tað* ēinaferð *verða?*

KAPITUL 14

ORÐ HARRANS, sum kom til Jeremiah viðvíkjandi svøltinum.

2 Judah harmar, og tess portur fána; tey eru svørt at jørðini; og Jerusalems róp er farið upp.

3 Og teirra tignarmenn hava sent hini smáu síni til vøtnini: tey komu til holurnar, *og* funnu einkið vatn; tey vendu aftur við kerum sínum tómum; teir skammaðust og fjamskaðust, og huldu síni høvur.

4 Av tí at lendið er sprekkað, tí at tað var einkið regn á jørðini, plógmenninir skammaðust, teir huldu síni høvur.

5 Ja, hindin eisini kálvaði í akrinum, og yvirgav *hann,* av tí at har var einkið gras.

6 Og villasnarnir stóðu í teimum høgu plássunum, teir snúsaðu upp vindin líka *sum* drekar; teirra eygu bilaðu, av tí at *har var* einkið gras.

7 ¶ O HARRI, hóast okkara misgerðir vitna ímóti okkum, ger tú *tað* fyri navns tíns skuld: tí at okkara fráføll eru mong; vit hava syndað ímóti tær.

8 O vón Ísraels, frelsari tess í trongdartíð, hví skuldirt tú verið sum ein fremmandur í landinum, og eins og ein vegfarandi maður *sum* vendir til viks at steðga í eina nátt?

9 Hví skuldirt tú verið sum ein maður øtaður, sum ein mektigur maður *sum* ikki kann frelsa? tú tó, O HARRI, *ert* í miðjum okkum, og vit eru kallaðir við navni tínum; far ikki frá okkum.

10 ¶ Svá sigur HARRIN við hetta fólk, Svá hava teir elskað at reika, teir hava ikki hildið aftur fótum sínum, HARRIN tessvegna góðtekur teir ikki; hann vil nú minnast til teirra misgerð, og heimsøkja teirra syndir.

11 Tá segði HARRIN við meg, Bið ikki fyri hesum fólki til *teirra* góða.

12 Tá ið teir fasta, vil eg ikki hoyra teirra róp; og tá ið teir ofra brennioffur og eitt tilbiðjanar-offur, vil eg ikki góðtaka teir: men eg vil upptæra teir viðˆ svørðinum, og viðˆ hungursneyðini, og viðˆ drepsóttini.

13 ¶ Tá segði eg, Á, Harri GUÐ! sí, prophetarnir siga við teir, Tit skulu ei síggja svørðið, eiheldur skulu tit hava hungursneyð; men eg vil geva tykkum tryggjaðan frið í hesum plássi.

14 Tá segði HARRIN við meg, Prophetarnir prophetera lygnir í navni mínum: eg sendi teir ikki, eiheldur havi eg skipað teimum, eiheldur talaði við teir: teir prophetera tykkum eina falska sjón og spásøgn, og eitt ting av ongum *virði,* og svik hjarta síns.

15 Tessvegna, svá sigur HARRIN viðvíkjandi prophetunum sum prophetera í navni mínum, og eg sendi teir ikki, tó siga teir, Svørð og hungursneyð skulu ikki vera í hesum landi; Við svørði og hungursneyð skulu teir prophetarnir verða upptærdir.

16 Og fólkið, fyri hvørjum teir prophetera, skal verða kastað út á gøtur Jerusalems orsakað av hungursneyðini og svørðinum; og teir skulu ongan hava at jarða seg, teir, konur teirra, ella synir teirra, ella døtur teirra: tí at eg vil hella teirra vondsku omanyvir teir.

17 ¶ Tí skalt tú siga hetta orðið við teir; Lat míni eygu renna niður við tárum nátt og dag, og lat tey ikki gevast: tí at jomfrú dóttir fólks míns er brotin við einum miklum bresti, við einum sera herviligum stoyti.

18 Um eg fari fram á akurin, tá sí hinir vignu við svørðinum! og um eg innfari inn í staðin, tá sí teir sum eru sjúkir við hungursneyð! ja, bæði propheturin og presturin fara umkring inn í eitt land sum teir kenna ikki.

19 Hevurt tú aldeilis havnað Judah? hevur sál tíni vamlast *við* Zion? hví hevurt tú sligið okkum, og *tað finst* eingin grøðing til okkara? vit væntaðu eftir friði, og *tað finst* einkið gott; og eftir tíðini av grøðing, og sí trongd!

20 Vit viðurkenna, O HARRI, vára vondsku, *og* misgerðina hjá várum fedrum: tí at vit hava syndað ímóti tær.

21 Ikki stiknast við *okkum,* fyri navns tíns skuld, vanæra ikki hásæti dýrdar tínar: minst til, brót ikki tín sáttmála við okkum.

22 Eru tað *nakrar* millum fáfongdirnar hjá Heidningunum, sum kunnu elva regni? ella kunnu himnarnir geva skúrir? *ert* ikki tú hann, O HARRI Guð vár? tí vilja vit bíða eftir tær: tí at tú hevurt gjørt øll hesi *ting*.

KAPITUL 15

TÁ segði HARRIN við meg, Tó *at* Móses og Sámuel stóðu frammi fyri mær, *tó kundi* hugur mín ikki *verið* mótvegis hesum fólki: kasta *teir* út úr eygsjón míni, og lat teir fara avstað.

2 Og tað skal bera á, um teir sigi við teg, Hvagar skulu vit fara avstað? tá skalt tú siga teimum, Svá sigur HARRIN; Slíkir sum *eru* til deyða, til deyða; og slíkir sum *eru* til svørðið, til svørðið; og slíkir sum *eru* til hungursneyðina, til hungursneyðina; og slíkir sum *eru* til fangaskapin, til fangaskapin.

3 Og eg vil útnevna yvir teimum fýra sløg, sigur HARRIN: Svørðið at vega, og hundarnar at skræða, og fuglar himinsins, og djór jarðarinnar, at upptæra og oyða.

4 Og eg vil elva teimum at verða burtfluttar inn í øll kongadømir jarðarinnar, uppá grund av Mă-năs´-sēh Hĕz-ē-kí´-ăh syni, Judah kongi, fyri *tað* sum hann gjørdi í Jerusalem.

5 Tí at hvør skal taka synd í tær, O Jerusalem? ella hvør skal stynja um teg? ella hvør skal fara til viks at spyrja hvussu tær veit við?

6 Tú hevurt yvirgivið meg, sigur HARRIN, tú ert farin aftureftir:

tí vil eg rætta út mína hond ímóti tær, og oyða teg; eg eri móður av at iðrast.

7 Og eg vil foykja teir við eini varpkvísl í portrum landsins; eg vil ræna *teir* fyri børn, eg vil oyða fólk mítt, *eftirsum at* teir venda ikki aftur frá vegum sínum.

8 Teirra einkjur eru øktar fyri mær uppum sand sjógvanna: eg havi fært uppá teir ímóti móðrini at ungu monnunum ein oyðara á middegi: eg havi volt *honum* at falla omanyvir tað brádliga, og ræðslur omanyvir staðin.

9 Hon, sum føtt hevur sjey, kámast: hon hevur givið upp andan; hennara sól er farin niður meðan *tað var* enn dagur: hon hevur skammast og fjamskast: og hitt eftirverandi av teimum vil eg flýggja til svørðið frammi fyri teirra fíggindum, sigur HARRIN.

10 ¶ Eya meg, móðir mín, at tú hevurt føtt meg — ein mann av stríði og ein trætnaðarmann fyri allari jørðini! eg havi hvørki lænt út uppá fæleigu, ella hava menn lænt til mín uppá fæleigu; *tó* bannar hvør *og* ēin teirra meg.

11 HARRIN segði, Sanniliga, tað skal vera væl *statt* hjá leivd tíni; sanniliga, eg vil elva fíggindanum at bøna teg *væl* í tíðini av illum og í tíðini av nívd.

12 Skal jarn bróta tað norðara jarnið og stálið?

13 Títt *fíggjar*evni og tínar dýrgripir vil eg geva til herfongin uttan prís, og *tað* fyri allar syndir tínar, enntá í øllum landamørkum tínum.

14 Og eg vil fáa *teg* at fara yvir við tínum fíggindum inn í eitt land *sum* tú kennirt ei: tí ein eldur er kyndur í míni firtni, *sum* skal brenna uppiá tykkum.

15 ¶ O HARRI, tú veitst: minst til mín, og vitja meg, og hevn meg yvir atsøkjarar mínar; tak meg ikki burtur í langmóð tíni: vita, at fyri tína skyld havi eg liðið hartan.

16 Tíni orð vórðu funnin, og eg át tey; og títt orð var mær frøi og fagnaður hjarta míns: tí at eg eri kallaður við navni tínum, O HARRI Guð herliðanna.

17 Eg sat ikki í savnaði spottaranna, ella fegnaðist; eg sat einsamallur orsakað av hond tíni: tí at tú hevurt fylt meg við harmavreiði.

18 Hví er mín pína viðvarandi, og sár mítt ógrøðiligt, *sum* sýtir at verða grøtt? vilt tú vera aldeilis yvirfyri mær sum ein lygnari, *og sum* vøtn *sum* svitast?

19 ¶ Tessvegna, svá sigur HARRIN, Um tú vendi aftur, tá vil eg føra teg aftur, *og* tú skalt standa frammi fyri mær: og um tú taki fram hitt dýrabæra frá hinum ringa, skalt tú vera sum muður mín: lat teir venda aftur at tær; men vend ikki tú aftur at teimum.

20 Og eg vil gera teg at hesum fólki *til* ein girdan messing múr: og teir skulu berjast ímóti tær, men teir skulu ikki hava yvirvág ímóti tær: tí at eg *eri* við tær til at frelsa teg og at bjarga tær, sigur HARRIN.

21 Og eg vil bjarga tær út úr hond hinna vondu, og eg vil endurloysa teg út úr hond hinna ræðuligu.

KAPITUL 16

ORÐ HARRANS kom eisini at mær, sigandi,

2 Tú skalt ikki taka tær eina konu, eiheldur skalt tú hava synir, ella døtur, í hesum plássi.

3 Tí at svá sigur HARRIN viðvíkjandi sonunum og viðvíkjandi døtrunum sum eru fødd í hesum plássi, og viðvíkjandi teirra møðrum sum føddu tey, og viðvíkjandi teirra fedrum sum gótu tey í hesum landi;

4 Tey skulu doyggja av herviligum deyðum; tey skulu ikki verða harmað; eiheldur skulu tey verða jarðað; *men* tey skulu verða sum tað uppiá ásjón jarðarinnar: og tey skulu verða uppslúkað av svørðinum, og av hungursneyð; og teirra lík skulu verða matur hjá fuglum himins, og hjá djórum jarðarinnar.

5 Tí at svá sigur HARRIN, Innfar ikki inn í harmingarhúsið, eiheldur far at harma, ella eymka tey: tí at eg havi tikið burt mín frið frá hesum fólki, sigur HARRIN, *enntá* elskandi blíðni og miskunnir.

6 Bæði hin mikli og hin smái skulu doyggja í hesum landi: teir skulu ei verða jarðaðir, eiheldur skulu *menn* harma yvir teir, ella skera seg, ella gera seg skallutar fyri teir:

7 Eiheldur skulu *menn* skræða *seg* yvir teir í harman, til at ugga seg um hinar deyðu; eiheldur skulu *menn* geva teimum troystanarbikarið at drekka yvir faðir teirra, ella yvir móðir teirra.

8 Tú skalt ikki eisini fara inn í veitslingarhúsið, at sita við teimum at eta og at drekka.

9 Tí at svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil fáa at gevast úr hesum plássi í eygum tykkara, og í døgum tykkara, røddina av kæti, og røddina av gleði, røddina á brúðgóminum, og røddina á brúðrini.

10 ¶ Og tað skal bera á, tá ið tú skalt sýna hesum fólki øll hesi orð, og teir skulu siga við teg, Hvørsvegna hevur HARRIN lýst alt hetta mikla illa ímóti okkum? ella hvat *er* okkara misgerð? ella hvat *er* okkara synd sum vit hava framt ímóti HARRANUM Guði okkara?

11 Tá skalt tú siga við teir, Av tí at tykkara fedrar hava yvirgivið meg, sigur HARRIN, og hava gingið eftir øðrum gudum, og hava tænt teimum, og hava tilbiðið teir, og hava yvirgivið meg, og hava ikki hildið mína lóg;

12 Og tit hava gjørt verri enn fedrar tykkara; tí at sí, tit ganga hvør *og* ēin eftir ímyndan illa hjarta síns, at teir mega ikki lýða á meg:

13 Tí vil eg kasta tykkum út úr hesum landi inn í eitt land sum tit kenna ikki, *hvørki* tit, ella fedrar tykkara; og har skulu tit tæna øðrum gudum dag og nátt; hvar eg vil ikki sýna tykkum góðvild.

14 ¶ Tessvegna, sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at tað skal ei meira verða sagt, HARRIN livir, sum førdi upp børn Ísraels út úr Egyptalandi;

15 Men, HARRIN livir, sum førdi upp Ísraels børn frá landi norðursins, og frá øllum londunum, hvagar hann hevði rikið teir: og eg vil føra teir aftur inn í teirra land, sum eg gav teirra fedrum.

16 ¶ Sí, eg vil senda eftir mongum fiskimonnum, sigur HARRIN, og teir skulu fiska teir; og síðan vil eg senda eftir mongum veiðimonnum, og teir skulu veiða teir frá hvørjum fjalli, og frá hvørjum heyggi, og út úr holum klettanna.

17 Tí at míni eygu *eru* uppá allar teirra vegir: teir eru ikki fjaldir frá andliti mínum, eiheldur er teirra misgerð fjald frá eygum mínum.

18 Og fyrst vil eg endurgjalda teirra misgerð og teirra synd tvífalt; av tí at teir hava dálkað land mítt, teir hava fylt mín arv við ræunum av sínum stikniligu og andstyggiligu tingum.

19 O HARRI, mín styrki, og mín festningur, og mítt skjól á degi nívdarinnar, Heidningarnir skulu koma at tær frá endum jarðarinnar, og skulu siga, Vissuliga, okkara fedrar hava arvað lygnir, fáfongd, og *ting* í hvørjum einkið gagn *er*.

20 Skal ein maður gera sær gudar, og teir *eru* eingir gudar?

21 Tessvegna, sí, eg vil hesa
ēinu ferð elva teimum at kenna,
eg vil elva teimum at kenna
mína hond og mína megi; og teir
skulu vita, at navn mítt *er*
HARRIN.

KAPITUL 17

SYNDIN hjá Judah *er* skrivað
við einum penni av jarni, *og*
við oddinum á einum diamanti:
hon er rist uppá talvu hjarta
teirra, og uppá hornini á tykkara
altarum;
2 Meðan teirra børn minnast
til teirra altør og teirra lundir við
hini grønu trø uppiá hinum høgu
heyggjum.
3 O fjall mítt í akrinum, eg vil
geva títt *figgjar*evni *og* allar tínar
dýrgripir til herfongin, *og* tíni
høgu pláss fyri synd, út gjøgnum
øll tíni landamørk.
4 Og tú, enntá tú sjálv, skalt
avbróta frá tínum arvaluti sum
eg gav tær; og eg vil elva tær at
tæna tínum figgindum í tí landi
sum tú kennirt ikki: tí at tit hava
kynt ein eld í míni firtni, *sum* skal
brenna um ævir.
5 ¶ Svá sigur HARRIN; Bannað-
ur *veri* tann maður sum troystar
á mann, og ger kjøt *til* arm sín, og
hvørs hjarta víkur frá HARRANUM.
6 Tí at hann skal vera líkur
lynginum í oyðimørkini, og skal
ikki síggja tá ið gott kemur; men
skal búgva í hinum svidnu pláss-
um í oyðuni, *í* einum søltum landi
og ikki búð í.
7 Vælsignaður *er* tann maður
sum troystar á HARRAN, og hvørs
vón HARRIN er.
8 Tí at hann skal vera sum eitt
træ, plantað við vøtnini, og *sum*
breiðir út sínar røtur við ánna, og
skal ikki síggja tá ið hiti kemur,
men tess leyv skal vera grønt; og
skal ikki vera sútfullur í árinum
av turki, eiheldur skal halda upp-
at frá at veita ávøkst.
9 ¶ Hjartað *er* svikafult upp-
um øll *ting*, og vónloysiliga vont:
hvør kann kenna tað?
10 Eg, HARRIN, rannsaki hjart-
að, *eg* royni nýruni, enntá *fyri* at
geva hvørjum manni samsvarandi
við hansara vegir, *og* samsvarandi
við ávøkstin av hansara gerðum.
11 *Eins og* akurhønan situr *á*
eggum, og klekir *tey* ikki; *soleiðis*
skal hann, sum skaffar ríkdómar,
og ikki við rætti, eftirlata teir í
miðjum døgum sínum, og við sín
enda skal vera ein dári.
12 ¶ Eitt dýrdsamt, høgt hásæti
frá byrjanini *er* pláss halgidóms
várs.
13 O HARRI, vón Ísraels, allir,
sum yvirgeva teg, skulu skamm-
ast; *og* teir, sum víkja frá mær,
skulu verða skrivaðir í jørðini; av
tí at teir hava yvirgivið HARRAN,
keldu livandi vatna.
14 Grøð meg, O HARRI, og eg
skal vera grøddur; frels meg, og
eg skal vera frelstur: tí at tú *ert*
mítt lov.
15 ¶ Sí, teir siga við meg, Hvar
er orð HARRANS? lat tað koma nú.
16 Hvat viðvíkur mær, eg havi
ikki skundað frá *at vera* ein hirði
at fylgja tær: eiheldur havi eg trá-
að hin veifulla dag; tú veitst: tað,
sum kom út av varrum mínum,
var *rætt* frammi fyri tær.
17 Ver ikki ein ræðsla at mær:
tú *ert* mín vón á ilskunnar degi.
18 Lat teir verða fjamskaðar
sum søkja at mær, men lat ikki
meg verða fjamskaðan: lat teir
verða mótfalnar, men lat ikki
meg verða mótfalnan: før oman-
yvir teir ilskunnar dag, og oyð
teir við tvífaldari oyðing.
19 ¶ Svá segði HARRIN við
meg; Far og statt í portri fólk-
sins barna, hvarum kongarnir av
Judah koma inn, og um hvørt
teir fara út, og í øllum portrum
Jerusalems;
20 Og sig við teir, Hoyrið tit

ord HARRANS, tit kongar av Judah, og alt Judah, og allir íbúgvar Jerusalems, sum innfara inn um hesi portur:

21 Svá sigur HARRIN; Verið varnir um tykkum sjálvar, og berið onga byrði á sabbatsdeginum, ella førið *hana* inn við portrini av Jerusalem;

22 Eiheldur berið fram eina byrði úr tykkara húsum á sabbatsdeginum, eiheldur geri tit nakað arbeiði, men halgið tit sabbatsdagin, eins og eg bjóðaði tykkara fedrum.

23 Men teir lýddu ikki, eiheldur boygdu sítt oyra, men gjørdu sín svíra stívan, at teir máttu ikki hoyra, ella taka við leiðbeining.

24 Og tað skal bera á, um tit dúgliga lýði á meg, sigur HARRIN, onga byrði at føra inn ígjøgnum portrini av hesum staði á sabbatsdeginum, men halgi sabbatsdagin, einkið arbeið at gera harí;

25 Tá skulu tað innfara inn í portrini av hesum staði kongar og prinsar, sitandi uppiá hásæti Dávids, ríðandi í vagnum og á hestum, teir, og teirra prinsar, menninir av Judah, og íbúgvar Jerusalems: og hesin staður skal verða verandi um ævir.

26 Og teir skulu koma frá staðunum av Judah, og frá plássunum kring Jerusalem, og frá landi Benjamins, og frá slættanum, og frá fjøllunum, og úr sunnan, komandi við brenniofrum, og sláturofrum, og matofrum, og roykilsi, og komandi við lovofrum, at húsi HARRANS.

27 Men um tit vilji ikki lýða á meg, at halga sabbatsdagin, og ikki at bera eina byrði, enntá innfarandi inn um portrini av Jerusalem á sabbatsdeginum; tá vil eg kynda ein eld í portrum tess, og hann skal upptæra slottini av Jerusalem, og hann skal ei verða sløktur.

KAPITUL 18

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah frá HARRANUM, sigandi,

2 Reis *teg,* og far oman til húss leirkerasmiðarins, og har vil eg elva tær at hoyra míni orð.

3 Tá fór eg oman til húss leirkerasmiðarins, og sí, hann virkaði eitt verk á hjólunum.

4 Og kerið, sum hann gjørdi av leiri, skemdist í hond leirkerasmiðarins: so hann gjørdi tað aftur eitt annað ker, eins og sýndist gott fyri leirkerasmiðinum at gera *tað*.

5 Tá kom orð HARRANS til mín, sigandi,

6 O hús Ísraels, kann ikki eg gera við tykkum eins og hesin leirkerasmiðurin? sigur HARRIN. Sí, eins og leirið *er* í hond leirkerasmiðarins, soleiðis *eru* tit í hond míni, O hús Ísraels.

7 *Á ti* eygnabragdi eg skal tala viðvíkjandi eini tjóð, og viðvíkjandi einum kongadømi, at slíta upp, og at hála niður, og at oyða *tað;*

8 Um tann tjóð, ímóti hvørjum eg havi lýst, vendi frá teirra ilsku, *tá* vil eg iðra *meg* um hitt illa sum eg hugsaði at gera teimum.

9 Og *á ti* eygnabragdi eg skal tala viðvíkjandi eini tjóð, og viðvíkjandi einum kongadømi, at byggja og at planta *tað;*

10 Um tað geri ilt í eygsjón míni, at tað lýði ikki mína rødd, tá vil eg iðra *meg* um hitt góða, við hvørjum eg segði, *at* eg vildi gagna teimum.

11 ¶ Nú tessvegna, kom nú, tala til menninar av Judah, og til íbúgvarnar av Jerusalem, sigandi, Svá sigur HARRIN; Sí, eg myndi ilt ímóti tykkum, og upphugsi eitt snildarráð ímóti tykkum: vendið tit aftur nú hvør *og* ēin frá illa

vegi sínum, og gerið tykkara vegir og tykkara gerðir góðar.

12 Og teir søgdu, Tað er eingin vón: men vit vilja ganga eftir okkara egnu snildarráðum, og vit vilja hvør *og* ein gera ímyndan illa hjarta síns.

13 Tessvegna, svá sigur HARRIN; Spyrjið tit nú hinna heidnu millum, hvør hevur hoyrt slík ting: Ísraels jomfrú hevur gjørt eitt sera ræðuligt ting.

14 Vil *ein maður* eftirlata snjó Lī´-bă-nŏn-s *sum kemur* frá kletti akursins? *ella* skulu hini køldu fløðandi vøtn, sum koma frá einum øðrum plássi, verða yvirgivin?

15 Av tí at fólk mítt hevur gloymt meg, teir hava brent roykilsi fyri fáfongd, og teir hava volt teimum at snáva í sínum vegum *frá* fyrndar rásunum, til at ganga í rásum, *í* einum vegi — ei laðaður upp;

16 At gera land sítt oyði, *og* eina viðvarandi fising; hvør tann, sum fer framvið harhjá, skal verða ógvaður, og rista høvur sítt.

17 Eg vil spjaða teir sum við einum eystanvindi frammi fyri fíggindanum; eg vil sýna teimum ryggin, og ikki andlitið, á deginum av teirra skaðatilburði.

18 ¶ Tá søgdu teir, Komið, og latum okkum upphugsa snildarráð˘ ímóti Jeremiah; tí at lógin skal ikki farast frá prestinum, ella ráð frá tí vísa, ella orðið frá prophetinum. Komið, og latum okkum slá hann við tunguni, og latum okkum ikki geva gætur eftir nøkrum av orðum hansara.

19 Gev gætur eftir mær, O HARRI, og lurta eftir røddini á teimum ið træta við meg.

20 Skal ilt verða endurgoldið fyri gott? tí at teir hava grivið eina holu til mína sál. Minst til, at eg stóð frammi fyri tær til at tala gott fyri teir, *og* at venda burt tíni vreiði frá teimum.

21 Tessvegna flýggja upp teirra børn til hungursneyðina, og hell út teirra *blóð* viˆ svørðsins kraft; og lat teirra konur verða rændar fyri síni børn, og *vera* einkjur; og lat teirra menn verða tiknar av lívi; *lat* teirra ungu menn *verða* vignar viˆ svørðinum í bardaga.

22 Lat eitt róp verða hoyrt frá teirra húsum, tá ið tú skalt føra eina fylking brádliga uppá teir: tí at teir hava grivið eina holu til at taka meg, og fjalt snerrur til føtur mínar.

23 Tó, HARRI, tú kennirt alt teirra ráð ímóti mær til at vega *meg:* fyrigev ikki teirra misgerð, eiheldur sletta út teirra synd frá tíni eygsjón, men lat teir verða rendar um koll frammi fyri tær; far *soleiðis* við teimum í tíðini av tíni firtni.

KAPITUL 19

SVÁ sigur HARRIN, Far og fá *tær* eina leir fløsku hjá leirkerasmiði, og *tak* av hinum elligomlu fólksins, og av hinum elligomlu prestanna;

2 Og far út at dali Hĭn´-nŏm-s sonar, sum *er* við innfaringina av eystur portrinum, og kunnger har orðini sum eg skal siga tær,

3 Og sig, Hoyrið tit HARRANS orð, O kongar av Judah, og íbúgvar av Jerusalem; Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil føra ilt omanyvir hetta plás, hvørt hvørsumhelst *ið* hoyrir, oyruni á honum skulu ringja.

4 Av tí at teir hava yvirgivið meg, og hava fremmandgjørt hetta plás, og hava brent roykilsi í tí at øðrum gudum, hvørjar hvørki teir ella teirra fedrar hava kent, ella kongarnir av Judah, og hava fylt hetta plás við blóðinum av sakleysum;

5 Teir hava bygt eisini hini høgu pláss Bā´-ăl-s, til at brenna

sínar synir við eldi *til* brennioffur˘ at Bā´ăl-i, hvørt eg beyð ikki, ella talaði *tað,* eiheldur kom *tað* inn í mín huga:

6 Tessvegna, sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at hetta plåss skal ei meira verða kallað Tŏ´-phĕt, ella Dalur Hĭn´-nŏm-s sonar, men slátranardalurin.

7 Og eg vil gera tómt ráðið hjá Judah og Jerusalem í hesum plássi; og eg vil elva teimum at falla viðˆ svørðinum frammi fyri sínum fíggindum, og viðˆ hondunum á teimum sum søkja teirra lívˇ: og teirra ræˇ vil eg geva til at vera matur hjá fuglum himins, og hjá djórum jarðarinnar.

8 Og eg vil gera henda stað oydnan, og *til* eina fising; hvør tann, ið fer framvið harvið, skal verða ógvaður og físa uppá grund av øllum plágunum harhjá.

9 Og eg vil elva teimum at eta kjøtið á sonum sínum og kjøtið á døtrum sínum, og teir skulu eta hvør *og* ēin kjøtið á sínum vini í kringsetingini og trongsemini, hvarvið teirra fíggindar, og teir sum søkja teirra lívˇ, skulu treingja teir.

10 Tá skalt tú bróta fløskuna í eygsjónini á monnunum sum fara við tær,

11 Og skalt siga við teir, Svá sigur HARRI herliðanna; Enntá soleiðis vil eg bróta hetta fólk og henda stað, eins og *ēin* brýtur kerið hjá einum leirkerasmiði, sum kann ikki verða gjørt heilt aftur: og teir skulu jarða *teir* í Tŏ´-phĕt, til *tað verði* einkið plåss at jarða.

12 Svá vil eg gera at hesum plássi, sigur HARRIN, og við íbúgvar tess, og *enntá* gera henda stað sum Tŏ´-phĕt:

13 Og húsini av Jerusalem, og húsini hjá kongunum av Judah, skulu verða dálkaði sum plássini av Tŏ´-phĕt, uppá grund av øllum húsunum, uppiá hvørs tøkum teir hava brent roykilsi at øllum herliði himins, og hava helt út drykkoffurˇ at øðrum gudum.

14 Tá kom Jeremiah frá Tŏ´-phĕt, hvagar HARRIN hevði sent hann at prophetera; og hann stóð í forgarði HARRANS húss; og segði til alt fólkið,

15 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil føra omanyvir henda stað og omanyvir allar hennara býir alt tað illa sum eg havi lýst ímóti tí, av tí at teir hava hert sínar svírar, at teir máttu ikki hoyra míni orð.

KAPITUL 20

NÚ, Păsj´-ûr Ĭm´-mĕr-s sonur prestur, sum *var* eisini høvuðs stjórnari í húsi HARRANS, hoyrdi at Jeremiah propheteraði hesi ting.

2 Tá sló Păsj´-ûr Jeremiah prophet, og setti hann í stokkin sum *var* í høga portri Benjamins, sum *var* hjá húsi HARRANS.

3 Og tað bar á um morgnárið, at Păsj´-ûr førdi fram Jeremiah út úr stokkinum. Tá segði Jeremiah við hann, HARRIN hevur ikki kallað navn títt Păsj´-ûr, men Mā´-gôr-mĭs-sā´-bĭb.

4 Tí at svá sigur HARRIN, Sí, eg vil gera teg *til* eina ræðslu fyri tær sjálvum, og fyri øllum vinum tínum: og teir skulu falla viðˆ svørði fíggindra sína, og tíni eygu skulu sjá *tað:* og eg vil geva alt Judah inn í hondina á kongi Bábylons, og hann skal bera teir *til* fanga inn í Bábylon, og skal vega teir við svørðinum.

5 Harafturat vil eg flýggja alla styrkina hjá hesum staði, og øll strevini harhjá, og øll tey dýrabæru tingini harhjá, og allar dýrgripirnar hjá kongunum av Judah vil eg geva inn í hondina á teirra fíggindum, sum skulu ræna teir, og taka teir, og bera teir til Bábylon.

6 Og tú, Păsj´-ûr, og øll sum búgva í tínum húsi, skulu fara inn í fangaskap: og tú skalt koma til Bábylon, og har skalt tú doyggja, og skalt verða jarðaður har, tú, og allir tínir vinir, fyri hvørjum tú hevurt prophēterað lygnir.

7 ¶ O HARRI, tú hevurt teipað meg, og eg varð teipaður: tú ert sterkari enn eg, og hevurt havt yvirvág: eg eri í speireking dagliga, hvør *og* ēin spottar meg.

8 Tí at síðan eg talaði, geylaði eg út, eg geylaði harðskap og rán; av tí at orð HARRANS varð gjørt ein skemd at mær, og ein háðan, dagliga.

9 Tá segði eg, Eg vil ikki nevna hann, ella tala meira í hans navni. Men *hans orð* var í hjarta mínum sum ein brennandi eldur — innilokaður í beinum mínum, og eg var móður av at lata vera, og eg kundi ikki *halda aftur*.

10 ¶ Tí at eg hoyrdi útspilling mangra, ótti á hvørjari síðu. Ummæl, *siga teir,* og vit vilja ummæla tað. Allir mínir kunningar vaktaðu eftir míni haltan, *sigandi,* Vera má, *at* hann fer at verða lokkaður, og vit skulu hava yvirvág ímóti honum, og vit skulu taka okkara hevnd á honum.

11 Men HARRIN *er* við mær sum ein mektigur, ræðuligur ēin: tí skulu mínir atsøkjarar snáva, og teir skulu ikki hava yvirvág: teir skulu stórliga skammast; tí at teir skulu ikki framganga: *teirra* ævigtvarandi ørkymlan skal aldri verða gloymd.

12 Men, O HARRI herliðanna, sum roynirt hin rættvísa, *og* sært nýruni og hjartað, lat meg síggja tína hevnd yvir teir: tí at tær havi eg opnað mína søk.

13 Syngið at HARRANUM, prísið tit HARRANUM: tí at hann hevur útfríað sál hins arma frá hondini hjá illgerarum.

14 ¶ Bannaður *veri* dagurin, í hvørjum eg varð føddur: lat ikki dagin, í hvørjum móðir mín føddi meg, vera vælsignaðan.

15 Bannaður *veri* tann maður, sum bar tíðindir til faðirs míns, sigandi, Eitt sveinsbarn er føtt tær; gerandi hann sera glaðan.

16 Og lat tann mann vera sum staðirnir sum HARRIN kollrendi, og iðraðist ei: og lat hann hoyra geylið um morgunin, og rópingina á middagstíð;

17 Av tí at hann vá meg ikki frá móðurlívinum; ella at mín móðir mátti havt verðið mín grøv, og hennara móðurlív altíð *verðið* stórt *við mær*.

18 Hví kom eg fram út úr móðurlívinum til at síggja strev og sorg, at mínir dagar skuldu verða upptærdir við skomm?

KAPITUL 21

ORÐIÐ, sum kom at Jeremiah frá HARRANUM, tá ið Zĕd-ē-kī´-ăh kongur sendi at honum Păsj´-ûr Měl-chī´-ăh son, og Zê-phăn´-jăh Mā-ă-sĕj´-ăh son prest, sigandi,

2 Spyrst fyri, eg biði teg, av HARRANUM fyri okkum; tí at Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon førir kríggj ímóti okkum; um so veri at HARRIN vilji fara við okkum samsvarandi við øll síni undursomu verk, at hann má leggja avstað frá okkum.

3 ¶ Tá segði Jeremiah við teir, Svá skulu tit siga til Zĕd-ē-kī´-ăh:

4 Svá sigur HARRIN Guð Ísraels; Sí, eg vil venda tilbakar krígsvápnini sum *eru* í hondum tykkara, við hvørjum tit berjast ímóti kongi Bábylons, og *ímóti* Chăl-dē´-arunum, sum kringseta tykkum uttanfyri múrarnar, og eg vil fylkja teir inn í miðjuna av hesum staði.

5 Og eg sjálvur vil berjast ímóti tykkum við eini útstrektari hond og við einum sterkum armi, enntá í firtni, og í øði, og í miklari vreiði.

6 Og eg vil sláa íbúgvarnar av hesum staði, bæði mann og djór: teir skulu doyggja av eini miklari drepsótt.

7 Og síðan, sigur HARRIN, vil eg flýggja Zĕd-ē-kī´-ăh kong av Judah, og hans tænarar, og fólkið, og slíkar sum eru eftir í hesum staði frá drepsóttini, frá svørðinum, og frá hungursneyðini, inn í hondina á Nē-bū-chăd-rēz´-zâr kongi av Bábylon, og inn í hondina á teirra figgindum, og inn í hondina á teimum ið søkja teirra lív: og hann skal sláa teir við svørðseggini; hann skal ikki eira teimum, eiheldur hava várkunn, ella hava miskunn.

8 ¶ Og við hetta fólk skalt tú siga, Svá sigur HARRIN; Sí, eg seti frammanfyri tykkum lívsins veg, og deyðans veg.

9 Hann, sum verður *verandi* í hesum staði, skal doyggja við svørðinum, og við hungursneyðini, og við drepsóttini: men hann sum fer út, og fellur til Chăl-dē´-anna sum kringseta tykkum, hann skal liva, og hansara lív skal vera honum til ein herfong.

10 Tí at eg havi sett mítt andlit ímóti hesum staði til ilt, og ikki til gott, sigur HARRIN: hann skal verða givin inn í hondina á kongi Bábylons, og hann skal brenna hann við eldi.

11 ¶ Og varðandi húsi kongsins av Judah, *sig,* Hoyrið tit orð HARRANS;

12 O Dávids hús, svá sigur HARRIN; Útinnið dóm um morgunin, og útfríið *hann sum er* rændur út úr hondini á kúgaranum, at ikki mín øði fari út sum eldur, og brenni, *so* at eingin kann sløkkja *hana,* uppá grund av tí illa av tykkara gerðum.

13 Sí, eg *eri* ímóti tær, O íbúgvi dalsins, *og* klettur slættarins, sigur HARRIN; sum siga, Hvør skal koma oman ímóti okkum? ella hvør skal innfara inn í bústaðir okkara?

14 Men eg vil revsa tykkum samsvarandi við ávøkstin av tykkara gerðum, sigur HARRIN: og eg vil kynda ein eld í skóginum harav, og hann skal upptæra øll ting rundan um hann.

KAPITUL 22

SVÁ sigur HARRIN; Far oman til húsar kongsins av Judah, og tala har hetta orð,

2 Og sig, Hoyr HARRANS orð, O kongur av Judah, sum siturt uppiá hásæti Dávids, tú, og tænarar tínir, og fólk títt sum innfara við hesi portur:

3 Svá sigur HARRIN; Útinnið tit dóm og rættvísi, og útfríið hin rænda út úr hondini á kúgaranum: og gerið einkið rangt, innið ongan harðskap við hin fremmanda, hin faðirleysa, ella einkjuna, eiheldur úthellið sakleyst blóð í hesum plássi.

4 Tí at um tit geri hetta ting í roynd *og veru,* tá skulu tað innfara við portrini av hesum húsi kongar, sitandi uppiá hásæti Dávids, ríðandi í vagnum og á hestum, hann, og tænarar hans, og fólk hans.

5 Men um tit vilji ikki hoyra hesi orð, eg svørji við meg sjálvan, sigur HARRIN, at hetta hús skal gerast ein oyðing.

6 Tí at svá sigur HARRIN við kongsins hús av Judah; Tú *ert* Gilead at mær, *og* høvur Lī´-bă-nŏn-s: *tó* vil eg vissuliga gera teg *til* eitt reyn, *og* staðir *sum* eru ikki búnir í.

7 Og eg vil fyrireika oyðarar ímóti tær, hvør *og* ēin við vápnum sínum: og teir skulu skera niður tíni úrvals sedris*trø,* og kasta *tey* inn í eldin.

8 Og mangar tjóðir skulu fara framvið hesum staði, og teir skulu siga hvør maður til næsta síns,

Hvørsvegna hevur HARRIN gjørt soleiðis at hesum mikla staði?
9 Tá skulu teir svara, Av tí at teir hava yvirgivið sáttmála HARRANS Guðs síns, og tilbiðið aðrar gudar, og tænt teimum.
10 ¶ Grátið tit ikki um hin deyða, eiheldur harmið hann: *men* grátið sáran um hann sum fer burtur: tí at hann skal venda aftur ei meira, ella síggja sítt føðiland.
11 Tí at svá sigur HARRIN viðvíkjandi Sjal'-lum Jó'-sï-ăh syni kongi av Judah, sum ríkti í stað Jó'-sï-ăh faðirs síns, sum fór fram út úr hesum plássi; Hann skal ikki venda aftur hagar meira:
12 Men hann skal doyggja í tí plássi, hvagar teir hava leitt hann *til* fanga, og skal sjá hetta land ei meira.
13 ¶ Vei honum sum byggir sítt hús við rættvísi, og síni kømur við órætti; *sum* brúkar tænastu næsta síns uttan hýrur, og gevur honum ikki fyri hans arbeiði;
14 Sum sigur, Eg vil byggja mær eitt vítt hús og stór kømur, og sker sær út gluggar, og *tað er* tiljað við sedris*viði,* og málað við bjart-reyðum.
15 Skalt tú ríkja, av tí at tú lokart *teg sjálvan* í sedris*við?* át og drakk ikki faðir tín, og inti dóm og rættvísi, *og* tá *var tað* væl *statt* hjá honum?
16 Hann dømdi søkina hjá tí fátæka og tørvandi; tá *var tað* væl *statt hjá honum: var* ikki hetta at kenna meg? sigur HARRIN.
17 Men tíni eygu og títt hjarta *eru* ikki uttan til tína havisjúku, og til at úthella sakleyst blóð, og til kúgan, og til harðskap, at gera *tað*.
18 Tessvegna, svá sigur HARRIN viðvíkjandi Jě-hŏĭ'-ă-kĭm Jó'-sï-ăh syni kongi av Judah; Tey skulu ikki harma yvir hann, *sigandi,* Á, bróðir mín! ella, Á, systir! tey skulu ikki syrgja yvir hann, *sigandi,* Á, harri! ella, Á, dýrd hansara!
19 Hann skal verða jarðaður við jarðingini hjá einum asna, drigin og kastaður fram handan portrini av Jerusalem.
20 ¶ Far niðan til Lĭ'-bă-nŏn, og geyla; og lyft upp tína rødd í Bă'-sjăn, og geyla frá gjøgnumgongdunum: tí at allir tínir alskarar eru oyddir.
21 Eg talaði við teg í tíni framgongd; *men* tú segðirt, Eg vil ikki hoyra. Hetta *hevur verið* títt háttarlag frá ungdómi tínum, at tú aktaðirt ei mína rødd.
22 Vindurin skal eta upp allar tínar hirðar, og tínir elskarar skulu fara inn í fangaskap: vissuliga, tá skalt tú skammast og fjamskast fyri alla tína vondsku.
23 O Lĭ'-bă-nŏn-s íbúgvi, sum gert títt reiður í sedris*trø*unum, hvussu náðisamur skalt tú vera, tá ið verkir koma omanyvir teg, pínan sum hjá eini kvinnu í føðingarverkjum!
24 *Sum* eg livi, sigur HARRIN, tó *at* Cô-nĭ'-ăh Jě-hŏĭ'-ă-kĭm-s sonur kongur av Judah var innsiglisringurin uppiá míni høgru hond, tó vildi eg slitið teg haðani;
25 Og eg vil geva teg inn í hondina á teimum ið søkja títt lív; og inn í hondina *á teimum* hvørs andlit tú óttarst, enntá inn í hondina á Nĕ-bŭ-chăd-rēz'-zâr-i kongi av Bábylon, og inn í hondina á Chăl-dē'-unum.
26 Og eg vil kasta teg út, og tína móður sum føddi teg, inn í eitt annað land, hvar tit ei vórðu fødd; og har skulu tit doyggja.
27 Men til landsins, hvarat teir tráa at venda aftur, hagar skulu teir ikki venda aftur.
28 *Er* hesin maðurin Cô-nĭ'-ăh ein vanvirdur, brotin skurðgudur? *er hann* eitt ker, hvarí eingin góðtokki *er?* hví eru teir kastaðir

út, hann og sáð hansara, og eru kastaðir inn í eitt land sum teir kenna ikki?

29 O jørð, jørð, jørð, hoyr HARRANS orð.

30 Svá sigur HARRIN, Skrivið tit henda mann barnleysan, ein maður *sum* ikki skal blóma í døgum sínum: tí at eingin maður av hansara sáði skal blóma, sitandi uppiá hásæti Dávids, og stjórnandi meira í Judah.

KAPITUL 23

VEI veri hirðunum, sum oyða og spjaða seyð beitis míns! sigur HARRIN.

2 Tessvegna, svá sigur HARRIN Guð Ísraels ímóti hirðunum sum føða mítt fólk; Tit hava spjatt fylgi mítt, og rikið teir burt, og hava ikki vitjað teir: sí, eg vil vitja omanyvir tykkum tað illa av tykkara gerðum, sigur HARRIN.

3 Og eg vil savna leivdina av mínum fylgi burtur úr øllum londum, hvagar eg havi rikið teir, og vil føra teir aftur til teirra byrgir; og teir skulu vera fruktagóðir og taka til.

4 Og eg vil seta upp hirðar yvir teimum, sum skulu føða teir: og teir skulu óttast ei meira, ella vera mótfalnir, eiheldur skulu teir vera trótandi, sigur HARRIN.

5 ¶ Sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at eg vil reisa Dávidi eina rættvísa Grein, og ein Kongur skal ríkja og framganga, og skal útinna dóm og rættvísi á jørðini.

6 Á hansara døgum skal Judah verða frelst, og Ísrael skal búgva tryggliga: og hetta *er* hansara navn, við hvørjum hann skal vera kallaður, HARRIN OKKARA RÆTTVÍSI.

7 Tessvegna, sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, ið teir skulu ei meira siga, HARRIN livir, sum førdi upp Ísraels børn út úr Egyptalandi;

8 Men, HARRIN livir, sum førdi upp og sum leiddi sáðið av húsi Ísraels út úr norður landinum, og frá øllum londum, hvagar eg hevði rikið teir; og teir skulu búgva í sínum egna landi.

9 ¶ Mítt hjarta innan í mær er brotið uppá grund av prophetunum; øll míni bein rista; eg eri sum ein drukkin maður, og sum ein maður, hvørjum vín hevur vunnið á, uppá grund av HARRANUM, og uppá grund av orðunum av hans heilagleika.

10 Tí at landið er fult av hordómsfremjarum; tí uppá grund av svørjing syrgir landið; hini yndisligu pláss oyðunnar eru tornað upp, og teirra kós er ónd, og teirra kraft *er* ikki rætt.

11 Tí at bæði prophetur og prestur eru halgispottiligir; ja, í mínum húsi havi eg funnið teirra vondsku, sigur HARRIN.

12 Hvørsvegna teirra vegur skal vera teimum sum hálir *vegir* í myrkrinum: teir skulu verða riknir áfram, og falla hará: tí at eg vil føra ilt uppá teir, *enntá* árið av teirra heimsøking, sigur HARRIN.

13 Og eg havi sæð dárskap í prophetunum av Să-mâr´-ĭ-ŭ; teir propheteraðu í Bā´-ăl, og voldu fólki mínum Ísrael at fara skeivum.

14 Eg havi sæð eisini í prophetunum av Jerusalem eitt ræðuligt ting: teir fremja hordóm, og ganga í lygnum: teir styrkja eisini hendurnar hjá illgerarum, at eingin vendir aftur frá síni vondsku: teir eru mær allir samlir sum Sodoma, og tess íbúgvar sum Gō-mŏr´-răh.

15 Tessvegna, svá sigur HARRI herliðanna viðvíkjandi prophetunum; Sí, eg vil føða teir við malurt, og fáa teir at drekka vatnið av galli: tí at frá prophetunum av Jerusalem er halgispottiligsemi gingin út í alt landið.

16 Svá sigur HARRI herlið-

anna, Lýðið ikki á orðini hjá prophetunum sum prophetera innat tykkum: teir gera tykkum fáfongdar: teir tala eina sjón av sínum egna hjarta, *og* ikki út úr munni HARRANS.

17 Teir siga enn við teir sum vanvirða meg, HARRIN hevur sagt, Tit skulu hava frið; og teir siga við hvønn tann sum gongur eftir ímyndan egna hjarta síns, Einkið ilt skal koma uppá tykkum.

18 Tí at hvør hevur staðið í ráði HARRANS, og hevur varnast og hoyrt hans orð? hvør hevur merkt *sær* orð hans, og hoyrt *tað?*

19 Sí, ein meldurvindur HARRANS er gingin út í øði, enntá ein herviligur meldurvindur: hann skal falla herviligani uppá høvur hinna vondu.

20 HARRANS firtni skal ikki venda aftur, inntil hann havi útint, og til hann havi útint hugsanir hjarta síns: í hinum seinnu døgum skulu tit umhugsa tað fullkomiliga.

21 Eg havi ikki sent hesar prophetar, tó runnu teir: eg havi ikki talað til teirra, tó propheteraðu teir.

22 Men um teir høvdu staðið í ráði mínum, og høvdu volt mínum fólki at hoyra orðini hjá mær, tá høvdu teir havt vent teimum frá teirra illa vegi, og frá tí illa av teirra gerðum.

23 *Eri* eg ein Guð fyri hond, sigur HARRIN, og ikki ein Guð langt burturifrá?

24 Kann nakar fjala seg í loyndum plássum, at eg skal ikki síggja hann? sigur HARRIN. Fylli ikki eg himin og jørð? sigur HARRIN.

25 Eg havi hoyrt hvat prophetarnir søgdu, sum prophetera lygnir í navni mínum, sigandi, Meg hevur droymt, meg hevur droymt.

26 Hvussu leingi skal *hetta* vera í hjartanum á prophetunum sum prophetera lygnir? ja, *teir eru* prophetar av sviki egna hjarta síns;

27 Sum hugsa at volda mínum fólki at gloyma mítt navn við dreymum sínum, sum teir siga frá hvør maður fyri næsta sínum, eins og teirra fedrar hava gloymt mítt navn fyri Bā´ăl.

28 Propheturin, sum hevur ein dreym, lat hann siga frá einum dreymi; og hann, sum hevur orð mítt, lat hann tala mítt orð trúfastliga. Hvat *er* dumban fyri hveitinum? sigur HARRIN.

29 *Er* ikki mítt orð sum ein eldur? sigur HARRIN; og sum ein hamari, *sum* brýtur klettarnar í stykkir?

30 Tessvegna, sí, eg *eri* ímóti prophetunum, sigur HARRIN, sum stjala míni orð hvør *og* ēin frá næsta sínum.

31 Sí, eg *eri* ímóti prophetunum, sigur HARRIN, sum brúka tungur sínar, og siga, Hann sigur.

32 Sí, eg *eri* ímóti teimum sum prophetera falskar dreymar, sigur HARRIN, og siga frá teimum, og volda mínum fólki at fara skeivum viðˆ lygnum sínum, og viðˆ lætt*isli*gleika sínum; tó sendi eg teir ikki, ella skipaði teimum: tí skulu teir ikki gagna hesum fólki yvirhøvur, sigur HARRIN.

33 ¶ Og tá ið hetta fólk, ella propheturin, ella ein prestur, skulu spyrja teg, sigandi, Hvat *er* byrði HARRANS? tú skalt tá siga við teir, Hvør byrði? eg vil enntá yvirgeva tykkum, sigur HARRIN.

34 Og *hvat viðvikur* prophetinum, og prestinum, og fólkinum, sum skal siga, Byrði HARRANS, eg vil enntá revsa tann mann og hús hans.

35 Svá skulu tit siga hvør *og* ēin til næsta sín, og hvør *og* ēin til bróður sín, Hvat hevur HARRIN svarað? og, Hvat hevur HARRIN talað?

36 Og byrði HARRANS skulu tit nevna ei meira: tí at hvørs mans orð skal vera byrði hans; tí at tit hava spilt orðini hjá hinum livandi Guði, hjá HARRA herliðanna — Guði várum.

37 Svá skalt tú siga til prophetsins, Hvat hevur HARRIN svarað tær? og, Hvat hevur HARRIN talað?

38 Men eftirsum *at* tit siga, Byrði HARRANS; tessvegna, svá sigur HARRIN; Av tí at tit siga hetta orð, Byrði HARRANS, og eg havi sent at tykkum, sigandi, Tit skulu ikki siga, Byrði HARRANS;

39 Tessvegna, sí, eg, enntá eg, vil fullkomiliga gloyma tykkum, og eg vil yvirgeva tykkum, og staðin sum eg gav tykkum og fedrum tykkara, *og kasta tykkum* út úr nærveru míni:

40 Og eg vil føra eina ævigtvarandi skemd omanyvir tykkum, og eina viðvarandi skomm, sum skal ei verða gloymd.

KAPITUL 24

HARRIN sýndi mær, og sí, tvær tægur av fikum *vóru* settar frammanfyri tempul HARRANS, eftir at Nĕ-bŭ-ch̲ăd-rēz′-zâr kongur av Bábylon hevði borið burtur *til* fanga Jēc-ō-nī′-ăh Jĕ-hŏī′-ă-kĭm-s son kong av Judah, og prinsarnar av Judah, við snikkarunum og smiðum, frá Jerusalem, og hevði ført teir til Bábylon.

2 Ēin tæga *hevði* sera góðar fikur, *enntá* eins og tær fikur *sum* fyrst *eru* stadnar: og hīn tægan *hevði* sera illavorðnar fikur, sum kundu ikki verða etnar, tær vóru so ringar.

3 Tá segði HARRIN við meg, Hvat sært tú, Jeremiah? Og eg segði, Fikur; tær góðu fikurnar, sera góðar; og hinar illu, sera illar, sum kunnu ikki verða etnar, tær eru so illar.

4 ¶ Aftur kom orð HARRANS at mær, sigandi,

5 Svá sigur HARRIN, Guð Ísraels; Eins og hesar góðu fikur, so vil eg viðurkenna teir sum eru bornir burtur *til* fanga av Judah, hvørjar eg havi sent út úr hesum plássi inn í land Ch̲ăl-dē′-anna til *teirra* góða.

6 Tí at eg vil seta míni eygu uppá teir til gott, og eg vil føra teir aftur til hetta land: og eg vil byggja teir, og ikki hála *teir* niður; og eg vil planta teir, og ikki slíta *teir* upp.

7 Og eg vil geva teimum eitt hjarta til at kenna meg, at eg *eri* HARRIN: og teir skulu vera fólk mítt, og eg vil vera Guð teirra: tí at teir skulu venda aftur at mær við heila hjarta sínum.

8 ¶ Og eins og tær illu fikur, sum kunnu ikki verða etnar, tær eru so illar; vissuliga, svá sigur HARRIN, Soleiðis vil eg geva Zĕd-ĕ-kī′-ăh, kong Judah, og hansara prinsar, og hitt eftirverandi av Jerusalem, sum eru verandi í hesum landi, og teir sum búgva í Egyptalandi:

9 Og eg vil flýggja teir til at verða firraðar inn í øll kongadømir jarðarinnar til *teirra* skaða, *at vera* ein skemd og eitt orðtak, ein glósa og ein banning, í øllum plássum hvagar eg skal reka teir.

10 Og eg vil senda svørðið, hungursneyðina, og drepsóttina, teirra millum, til teir verði upptærdir oman av landinum sum eg gav teimum og til teirra fedrar.

KAPITUL 25

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah, viðvíkjandi øllum fólki Judah í hinum fjórða ári Jĕ-hŏī′-ă-kĭm-s Jó′-sī-ăh sonar kongi av Judah, sum *var* tað fyrsta árið hjá Nĕ-bŭ-ch̲ăd-rēz′-zâr kongi av Bábylon;

2 Hvørt Jeremiah prophetur talaði við alt fólk Judah, og til alra íbúgva Jerusalems, sigandi,
3 Frá hinum trettanda ári Jó-sĭăh Ámons sonar kongs av Judah, alt at hesum degi, tað *er* tað trý og tjúgunda árið, hevur HARRANS orð komið at mær, og eg havi talað innat tykkum, rísandi árla og talandi; men tit hava ikki lýtt á.
4 Og HARRIN hevur sent at tykkum allar sínar tænarar prophetarnar, rísandi árla og sendandi *teir;* men tit hava ikki lýtt á, ella boygt tykkar oyra at hoyra.
5 Teir søgdu, Vendið tit aftur nú hvør *og* ein frá illa vegi sínum, og frá tí illa av tykkara gerðum, og búgvið í landinum sum HARRIN hevur givið tykkum og til tykkara fedrar um ævir og ævir:
6 Og farið ikki eftir øðrum gudum at tæna teimum, og at tilbiðja teir, og tirrið meg ikki til firtnis við verkum handa tykkara; og eg vil einkið mein gera tykkum.
7 Tó hava tit ikki lýtt á meg, sigur HARRIN; at tit máttu tirra meg til firtnis við verkum handa tykkara til egna mein tykkara.
8 ¶ Tessvegna, svá sigur HARRI herliðanna; Av tí at tit hava ikki hoyrt míni orð,
9 Sí, eg vil senda og taka allar familjur norðursins, sigur HARRIN, og Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr, kongin av Bábylon, tænara mín, og vil føra teir ímóti hesum landi, og ímóti íbúgvum tess, og ímóti øllum hesum tjóðunum rundan um, og vil aldeilis oyða teir, og gera teir *til* eina øtan, og eina fising, og viðvarandi oyðingar.
10 Harafturat vil eg taka frá teimum røddina av kæti, og røddina av gleði, røddina á brúðgóminum, og røddina á brúðrini, ljóðið av kvarnarsteinunum, og ljósið av kertinum.
11 Og alt hetta land skal vera ein oyðing, *og* ein øtan; og hesar tjóðir skulu tæna kongi Bábylons sjeyti ár.
12 ¶ Og tað skal bera á, tá ið sjeyti ár eru fullførd, *at* eg vil revsa kongin av Bábylon, og ta tjóðina, sigur HARRIN, fyri teirra misgerð, og land Chăl-dē´-anna, og vil gera tað *til* viðvarandi oyðingar.
13 Og eg vil føra omanyvir tað landið øll míni orð sum eg havi úttalað ímóti tí, *enntá* alt sum er skrivað í hesi bók, sum Jeremiah hevur propheterað ímóti øllum tjóðunum.
14 Tí at mangar tjóðir og miklir kongar skulu tæna sær sjálvum av teimum eisini: og eg vil endurgjalda teimum samsvarandi við teirra gerðir, og samsvarandi við verk˘ egnu handa teirra.
15 ¶ Tí at svá sigur HARRIN Guð Ísraels við meg; Tak vínbikarið av hesi øði av míni hond, og elv øllum tjóðunum, til hvørja eg sendi teg, at drekka tað.
16 Og tær skulu drekka, og verða vikaðar, og verða órar, uppá grund av svørðinum sum eg vil senda teirra millum.
17 Tá tók eg bikarið av hond HARRANS, og fekk allar tjóðirnar at drekka, at hvørjum HARRIN hevði sent meg:
18 *Tað vil siga,* Jerusalem, og staðirnar av Judah, og kongar tess, og prinsar tess, at gera teir *til* eina oyðing, eina øtan, eina fising, og eina banning; eins og *tað er* henda dag;
19 Pharaoh kong av Egyptalandi, og hansara tænarar, og hansara prinsar, og alt hansara fólk;
20 Og alt tað blandaða fólkið, og allar kongarnar av Ûz landi, og allar kongarnar av landi Philistanna, og Ăsj´-kĕ-lŏn, og Azzah, og Ĕk´-rŏn, og leivdina av Ăsj´-dŏd,
21 Ē´-dóm, og Móab, og børn Ammons,

22 Og allar kongarnar av Týrŭs, og allar kongarnar av Zī´dŏn; og kongar oyggjanna, sum *eru* handan havsins,
23 Dĕ´dăn, og Tē´mă, og Bûz; og allar, *sum eru* í hinum ytstu *út*hornum,
24 Og allar kongarnar av Arabiu; og allar kongarnar av tí blandaða fólkinum, sum dvøljast í oyðimørkini;
25 Og allar kongarnar av Zimrī, og allar kongarnar av Ē´lăm, og allar kongarnar hjá Medunum,
26 Og allar kongar norðursins, fjar og nær, ēin við øðrum, og øll kongadømir veraldarinnar, sum *eru* uppiá ásjón jarðarinnar: og kongurin av Sjē´sjăch skal drekka aftaná teir.
27 Tí skalt tú siga við teir, Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Drekkið tit, og verðið druknir, og spýggið, og fallið, og rísið ei meira, uppá grund av svørðinum sum eg vil senda tykkara millum.
28 Og tað skal verða, um teir sýti at taka bikarið av tíni hond at drekka, tá skalt tú siga við teir, Svá sigur HARRI herliðanna; Tit skulu vissuliga drekka.
29 Tí at sí, eg byrji at føra ilt á staðin sum er kallaður við navni mínum, og skuldu tit verðið aldeilis órevsaðir? Tit skulu ikki verða órevsaðir: tí at eg vil kalla eftir einum svørði omanyvir allar íbúgvar jarðarinnar, sigur HARRI herliðanna.
30 Tessvegna prophetera tú ímóti teimum øll hesi orð, og sig við teir, HARRIN skal ýla frá í hæddini, og mæla síni rødd frá sínum heilaga býli; hann skal mektigani ýla omanyvir sítt býli; hann skal geva eitt róp, eins og teir sum treða *vín*drúvurnar, ímóti øllum íbúgvum jarðarinnar.
31 Eitt ljóð skal koma *enntá* til endar jarðarinnar; tí at HARRIN hevur eitt deilumál við tjóðirnar, hann vil føra søk við alt kjøt; hann vil geva teir *sum eru* vondir til svørðið, sigur HARRIN.
32 Svá sigur HARRI herliðanna, Sí, ilt skal ganga út frá tjóð til tjóð, og ein mikil meldurvindur skal verða reistur upp frá breddum jarðarinnar.
33 Og HARRANS vignu skulu vera á tí degi frá *ēinum* enda jarðarinnar enntá at *hīnum* enda jarðarinnar: teir skulu ikki verða harmaðir, eiheldur savnaðir, ella jarðaðir; teir skulu vera tød uppiá lendinum.
34 ¶ Ýlið, tit hirðar, og geylið; og veltið tykkum *í øskunum*, tit fremstu av fylginum: tí at dagarnir av tykkara slátring og av tykkara spjaðingum eru fullførdir; og tit skulu falla eins og eitt dámligt ker.
35 Og hirðarnir skulu ongan veg hava at flýggja, ella hinir fremstu av fylginum til at komast undan.
36 Ein rødd av rópi hirðanna, og ein ýling av hinum fremstu fylgisins, *skal verða hoyrt:* tí at HARRIN hevur rænt teirra beiti.
37 Og hinir friðsomu bústaðir eru skornir niður orsakað av hini grimmu firtni HARRANS.
38 Hann hevur yvirgivið skýli sítt, sum leyvan: tí at land teirra er oyði orsakað av ógvusligsemi kúgarans, og orsakað av hansara ógvusligu firtni.

KAPITUL 26

Í BYRJANINI av ríkjan Jĕhŏī´ă-kīm-s Jó´sī-ăh sonar, Judah kongs, kom hetta orðið frá HARRANUM, sigandi,
2 Svá sigur HARRIN; Statt í forgarðinum av húsi HARRANS, og tala yvirat øllum staðunum av Judah, sum koma at tilbiðja í húsi HARRANS, øll orðini sum eg ábjóði tær at tala við teir; minka um ikki eitt orð:

3 Um so veri, *at* teir vilji lýða á, og venda hvør maður frá illa vegi sínum, at eg má iðra meg um hitt illa, sum eg avráði at gera innat teimum uppá grund av tí illa av teirra gerðum.

4 Og tú skalt siga við teir, Svá sigur HARRIN; Um tit vilji ikki lurta eftir mær, at ganga í lóg míni, sum eg havi sett frammi fyri tykkum,

5 At lýða á orðini hjá mínum tænarum prophetunum, sum[P] eg sendi at tykkum, bæði rísandi upp árla, og sendandi *teir,* men tit hava ikki lýtt á;

6 Tá vil eg gera hetta hús líka *sum* Sjï´-lôh, og vil gera henda stað *til* eina banning fyri øllum tjóðum jarðarinnar.

7 So prestarnir og prophetarnir og alt fólkið hoyrdu Jeremiah talandi hesi orð í húsi HARRANS.

8 ¶ Nú, tað bar á, tá ið Jeremiah hevði lokið við at tala alt sum HARRIN hevði áboðið *honum* at tala við alt fólkið, at prestarnir og prophetarnir og alt fólkið tóku hann, sigandi, Tú skalt vissuliga doyggja.

9 Hví hevurt tú propheterað í navni HARRANS, sigandi, Hetta hús skal vera eins og Sjï´-lôh, og hesin staður skal verða oyðin uttan íbúgva? Og øll fólkini vóru savnaði ímóti Jeremiah í húsi HARRANS.

10 ¶ Tá ið prinsarnir av Judah hoyrdu hesi ting, tá komu teir niðan frá húsi kongsins at húsi HARRANS, og settust niður í inngongdini av tí nýggja portrinum av *húsi* HARRANS.

11 Tá talaðu prestarnir og prophetarnir við prinsarnar og til alt fólkið, sigandi, Hesin maður *er* verdur at doyggja; tí at hann hevur propheterað ímóti hesum staði, eins og tit hava hoyrt við oyrum tykkara.

12 ¶ Tá talaði Jeremiah við allar prinsarnar og til alt fólkið, sigandi, HARRIN sendi meg at prophetera ímóti hesum húsi og ímóti hesum staði øll orðini sum tit hava hoyrt.

13 Tessvegna nú, bøtið um tykkara vegir og tykkara gerðir, og aktið rødd HARRANS Guðs tykkara; og HARRIN vil iðra seg um hitt illa sum hann hevur lýst ímóti tykkum.

14 Hvat mær viðvíkur, sí, eg *eri* í hond tykkara: gerið við meg sum tykkum tykir gott og hóskiligt.

15 Men vitið tit fyri vist, at um tit taki meg av lívi, skulu tit vissuliga føra sakleyst blóð uppá tykkum sjálvar, og uppá henda stað, og uppá íbúgvar hans: tí av sonnum hevur HARRIN sent meg at tykkum at tala øll hesi orð í oyru tykkara.

16 ¶ Tá søgdu prinsarnir og alt fólkið við prestarnar og til prophetanna; Hesin maður *er* ikki verdur at doyggja: tí at hann hevur talað til okkara í navni HARRANS Guðs várs.

17 Tá risu upp ávísir av hinum elstu landsins, og talaðu til allan savnað fólksins, sigandi,

18 Mï´-căh Mô-răs-thït´-i propheteraði í døgum Hĕz-ĕ-kï´-ăh kongs av Judah, og talaði til alt fólkið av Judah, sigandi, Svá sigur HARRI herliðanna; Zion skal verða pløgt *sum* ein akur, og Jerusalem skal verða *til* rúgvur, og fjall hússins eins og tey høgu plássini av einum skógi.

19 Tók Hĕz-ĕ-kï´-ăh kongur av Judah og alt Judah hann yvirhøvur av lívi? óttaðist hann ikki HARRAN, og bønaði HARRAN, og HARRIN iðraði seg um hitt illa sum hann hevði lýst ímóti teimum? Svá máttu vit útvegað mikið ilt ímóti sálum várum.

20 Og har var eisini ein maður sum propheteraði í navni HARRANS, Ū´-rī-jăh Sjĕm-āï´-ăh sonur úr

Kĭr′-jăth-jē′-ă-rĭm, sum prophēteraði ímóti hesum staði og ímóti hesum landi samsvarandi við øll orðini hjá Jeremiah:

21 Og tá ið Jē-hoĭ′-ă-kĭm kongur, við øllum sínum mektigu monnum, og allir prinsarnir, hoyrdu orðini hjá honum, søkti kongurin at taka hann av lívi: men tá ið Ū′-rĭ-jăh hoyrdi tað, varð hann ræddur, og flýddi, og fór inn í Egyptaland;

22 Og Jē-hoĭ′-ă-kĭm kongur sendi menn inn í Egyptaland, *nevniliga,* Ēl′-nâ-thăn Āchʹ-bŏr-s son, og *ávísar* menn við honum inn í Egyptaland.

23 Og teir heintaðu fram Ū′-rĭ-jăh út úr Egyptalandi, og førdu hann at Jē-hoĭ′-ă-kĭm kongi; hvør vá hann við svørðinum, og kastaði hansara deyða likam inn í gravirnar hjá tí meiniga fólkinum.

24 Hóast hetta, hond Á-hī-kăm-s Sjā′-phăn-s sonar var við Jeremiah, at teir skuldu ikki geva hann inn í hondina á fólkinum at taka hann av lívi.

KAPITUL 27

Í BYRJANINI av ríkjan Jē-hoĭ′-ă-kĭm-s Jó′-sĭ-ăh sonar, Judah kongs, kom hetta orðið at Jeremiah frá HARRANUM, sigandi,

2 Svá sigur HARRIN til mín; Ger tær bond og okˇ, og set tey uppá háls tín,

3 Og send tey til kongin av Ē′-dóm, og til kongin av Móab, og til kongin av Ammonitunum, og til kongin av Týr-rŭs, og til kongin av Zĭ′-dŏn, viðˆ hondini á sendiboðunum sum komu til Jerusalem at Zĕd-ē-kĭ′-ăh kongi av Judah;

4 Og skipa teimum at siga við meistarar sínar, Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Svá skulu tit siga við meistarar tykkara;

5 Eg havi gjørt jørðina, mannin og djórið sum *eru* uppiá lendinum, viðˆ mínum mikla mátti og viðˆ mínum útrætta armi, og havi givið tað innat tí, *sump* tað tóktist hóskiligt yvirfyri mær.

6 Og nú havi eg givið øll hesi lond inn í hondina á Nĕ-bŭ-chădnēzʹ-zâr-i, kongi Bábylons, tænara mínum; og akursins djórˇ havi eg givið honum eisini at tæna honum.

7 Og allar tjóðir skulu tæna honum, og syni hansara, og syni sonar hansara, inntil sjálvasta tíðin hjá landi hansara komi: og tá skulu mangar tjóðir og miklir kongar tæna sær sjálvum av honum.

8 Og tað skal bera á, *at* ta tjóð og kongadømi sum vil ikki tæna hinum sama Nĕ-bŭ-chădnēzʹ-zâr-i, kongi Bábylons, og sum vil ikki seta háls sín undir okið hjá kongi Bábylons, ta tjóð vil eg revsa, sigur HARRIN, við svørðinum, og við hungursneyðini, og við drepsóttini, inntil eg havi upptært teir viðˆ hansara hond.

9 Tessvegna lýðið ikki tit á prophetar tykkara, ella á spásagnarmenn tykkara, ella á droymarar tykkara, ella á gandakvøðarar tykkara, ella á galdramenn tykkara, sum tala við tykkum, sigandi, Tit skulu ikki tæna kongi Bábylons:

10 Tí at teir prophetera eina lygn at tykkum, at firra tykkum fjart frá tykkara landi; og at eg skuldi rikið tykkum út, og tit skuldu farist.

11 Men tær tjóðir sum føra sín háls undir okið hjá kongi Bábylons, og tæna honum, tær vil eg lata verða verandi enn í teirra egna landi, sigur HARRIN; og tær skulu dyrka tað, og búgva harí.

12 ¶ Eg talaði eisini til Zĕd-ē-kĭ′-ăh kongs av Judah samsvarandi við øll hesi orð, sigandi, Førið tykkara hálsar undir okið

hjá kongi Bábylons, og tænið honum og fólki hans, og livið.

13 Hví vilja tit doyggja, tú og fólk títt, viðˋ svørðinum, viðˋ hungursneyðini, og viðˋ drepsóttini, eins og HARRIN hevur talað ímóti teirri tjóð sum vil ikki tæna kongi Bábylons?

14 Tessvegna lýðið ikki á orðini hjá prophetunum sum tala innat tykkum, sigandi, Tit skulu ikki tæna kongi Bábylons: tí at teir prophetera eina lygn at tykkum.

15 Tí at eg havi ikki sent teir, sigur HARRIN, tó prophetera teir eina lygn í navni mínum; at eg mátti rikið tykkum út, og at tit máttu farist, tit, og prophetarnir sum prophetera at tykkum.

16 Eisini talaði eg til prestarnar og til alt hetta fólk, sigandi, Svá sigur HARRIN; Lýðið ikki á orðini hjá prophetum tykkara, sum prophetera at tykkum, sigandi, Sí, kerini av húsi HARRANS skulu nú skjótt verða førd aftur frá Bábylon: tí at teir prophetera eina lygn at tykkum.

17 Lýðið ikki á teir; tænið kongi Bábylons, og livið: hví skuldi hesin staðurin verðið lagdur *í* oyði?

18 Men um teir *veri seg* prophetar, og um HARRANS orð veri *seg* hjá teimum, lat teir nú ganga í forbøn til HARRA herliðanna, at kerini, sum eru eftir í húsi HARRANS, og *í* húsinum hjá kongi Judah, og í Jerusalem, fari ikki til Bábylon.

19 ¶ Tí at svá sigur HARRI herliðanna viðvíkjandi súlunum, og viðvíkjandi sjógvinum, og viðvíkjandi undirstøðunum, og viðvíkjandi tí eftirverandi av kerunum sum eru verandi í hesum staði,

20 Hvørji Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur av Bábylon tók ikki, tá ið hann bar burtur *til* fanga Jēc-ō-nī´-ăh Jĕ-hōĭ´-ă-kĭm-s son kong av Judah frá Jerusalem til Bábylon, og allar tignarmenninar av Judah og Jerusalem;

21 Ja, svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels, viðvíkjandi kerunum sum eru verandi *í* húsi HARRANS, og *í* húsi kongsins av Judah og av Jerusalem;

22 Tey skulu verða borin til Bábylon, og har skulu tey verða inntil tann dag sum eg vitji tey, sigur HARRIN; tá vil eg føra tey niðan, og endurbøta tey til hetta pláss.

KAPITUL 28

OG tað bar á tað sama árið, í byrjanini av ríkjanini hjá Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongi av Judah, í tí fjórða árinum, *og* í tí fimta mánaðinum, *at* Hă-năn´-jăh Á´-zûr-s sonur prophetur, sum *var* úr Gibeon, talaði við meg í HARRANS húsi, í nærveruni av prestunum og av øllum fólkinum, sigandi,

2 Svá talar HARRI herliðanna, Guð Ísraels, sigandi, eg havi brotið okið hjá kongi Bábylons.

3 Innanfyri tvey samfull ár vil eg føra aftur inn í hetta pláss øll kerini av húsi HARRANS, sum Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur av Bábylon tók burtur frá hesum plássi, og bar tey til Bábylon:

4 Og eg vil føra aftur til hetta pláss Jēc-ō-nī´-ăh Jĕ-hōĭ´-ă-kĭm-s son, Judah kong, við øllum fangunum av Judah, sum fóru inn í Bábylon, sigur HARRIN: tí at eg vil bróta okið hjá kongi Bábylons.

5 ¶ Tá segði propheturin Jeremiah við prophetin Hă-năn´-jăh í nærveruni av prestunum, og í nærveruni av øllum fólkinum sum stóðu í húsi HARRANS,

6 Enntá propheturin Jeremiah segði, Á´-mĕn: geri HARRIN so: HARRIN útinni tíni orð sum tú hevurt propheterað, at føra aftur kerini av húsi HARRANS, og allar sum er bornir burt *til* fanga, frá Bábylon inn í hetta pláss.

7 Hóast hetta, hoyr tú nú hetta orð sum eg tali í tíni oyru, og í oyruni á øllum fólkinum;
8 Prophetarnir, sum hava verið undan mær og undan tær úr forðum, propheteraðu bæði ímóti mongum londum, og ímóti miklum kongadømum, um kríggj, og um ilt, og um drepsótt.
9 Tann prophetur sum prophteterar um frið, tá ið orðið hjá prophetinum skal bera á, *tá* skal tann prophetur verða kendur, at HARRIN hevur sanniliga sent hann.
10 ¶ Tá tók Hă-năn´-jăh prophetur okið uttan av hálsi Jeremiah prophets, og breyt tað.
11 Og Hă-năn´-jăh talaði í nærveruni av øllum fólkinum, sigandi, Svá sigur HARRIN; Enntá soleiðis vil eg bróta okið hjá Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongi av Bábylon frá hálsinum á øllum tjóðum innanfyri bilið á tvey samfull ár. Og propheturin Jeremiah fór sín veg.
12 ¶ Tá kom orð HARRANS at Jeremiah *propheti,* eftir at Hă-năn´-jăh prophetur hevði brotið okið uttan av hálsi Jeremiah prophets, sigandi,
13 Far og sig Hă-năn´-jăh, sigandi, Svá sigur HARRIN; Tú hevurt brotið okini av træi; men tú skalt gera fyri tey okˇ av jarni.
14 Tí at svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Eg havi koyrt eitt ok av jarni uppá hálsin á øllum hesum tjóðunum, at tær mega tæna Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongi av Bábylon; og tær skulu tæna honum: og eg havi givið honum djórˇ akursins eisini.
15 ¶ Tá segði propheturin Jeremiah við Hă-năn´-jăh prophet, Hoyr nú, Hă-năn´-jăh; HARRIN hevur ikki sent teg; men tú fært hetta fólk at troysta á eina lygn.
16 Tessvegna, svá sigur HARRIN; Sí, eg vil kasta teg omanav ásjón jarðarinnar: hetta árið skalt tú doyggja, av tí at tú hevurt frálært uppreist ímóti HARRANUM.
17 So Hă-năn´-jăh prophetur doyði tað sama árið í tí sjeynda mánaðinum.

KAPITUL 29

NÚ, hesi *eru* orðini av brævinum, sum Jeremiah prophetur sendi frá Jerusalem at hinum eftirverandi av hinum elstu sum vórðu bornir burtur fangar, og til prestarnar, og til prophetarnar, og til alt fólkið sum Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr hevði borið burt *til* fanga frá Jerusalem til Bábylon;
2 (Eftir at Jēc-ō-nī´-ăh kongur, og drotningin, og hirðmenninir, prinsarnir av Judah og Jerusalem, og snikkararnir, og smiðirnir, vóru farin avstað frá Jerusalem;)
3 Viðˆ hendi Ēl-á´-săh Sjá´-phăn-s sonar, og Gĕ-mär´-jăh Hĭl´-kī-ăh sonar, (hvørjar Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongur av Judah sendi at Bábylon til Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongs av Bábylon) sigandi,
4 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels, við allar sum eru bornir burtur fangar, hvørjar eg havi volt at verða bornar burt frá Jerusalem at Bábylon;
5 Byggið tit hús og búgvið *í teimum;* og plantið urtagarðar, og etið ávøkstin av teimum;
6 Takið tit ektakonur, og gitið synir og døtur; og takið ektakonur til synir tykkara, og gevið tykkara døtur til ektamenn, at tær mega føða synir og døtur; at tit mega verða øktir um har, og ikki minkaðir um.
7 Og søkið friðin hjá staðinum, hvagar eg havi volt tykkum at verða bornar burtur fangar, og biðjið til HARRANS fyri honum: tí at í friðinum harhjá skulu tit hava frið.
8 ¶ Tí at svá sigur HARRI her-

liðanna, Guð Ísraels; Latið ikki prophetar tykkara og spásigarar tykkara, sum *veri seg* í miðjum tykkum, villleiða tykkum, eiheldur lurtið eftir tykkara dreymum sum tit volda at verða droymdar.

9 Tí at teir prophetera falsliganiˇ at tykkum í navni mínum: eg havi ikki sent teir, sigur HARRIN.

10 ¶ Tí at svá sigur HARRIN, At eftir *at* sjeyti ár verði fullførd í Bábylon, vil eg vitja tykkum, og útinna mítt góða orð mótvegis tykkum, í at elva tykkum at venda aftur til hetta pláss.

11 Tí at eg veit tær hugsanir sum eg hugsi mótvegis tykkum, sigur HARRIN, hugsanir um frið, og ikki um ilt, at geva tykkum ein eftirvæntaðan enda.

12 Tá skulu tit kalla uppá meg, og tit skulu fara og biðja at mær, og eg vil lýða á tykkum.

13 Og tit skulu søkja meg, og finna *meg,* tá ið tit skulu leita eftir mær við øllum hjarta tykkara.

14 Og eg vil verða funnin av tykkum, sigur HARRIN: og eg vil venda burtur fangaskapi tykkara, og eg vil savna tykkum frá øllum tjóðunum, og frá teimum øllum plássunum, hvagar eg havi rikið tykkum, sigur HARRIN; og eg vil føra tykkum aftur inn í plássið, hvaðan eg voldi tykkum at verða bornar burtur fangar.

15 ¶ Av tí at tit hava sagt, HARRIN hevur reist okkum upp prophetar í Bábylon;

16 *Vitið,* at svá sigur HARRIN um kongin sum situr uppiá hásæti Dávids, og um alt fólkið sum býr í hesum staði, *og* um tykkara brøður sum eru ikki farnir fram við tykkum inn í fangaskap;

17 Svá sigur HARRI herliðanna; Sí, eg vil senda uppá teir svørðið, hungursneyðina, og drepsóttina, og vil gera teir sum ringar fikur, sum kunnu ikki verða etnar, tær eru so illar.

18 Og eg vil søkja at teimum við svørðinum, við hungursneyðini, og við drepsóttini, og vil flýggja teir at verða firraðar til øll kongadømir jarðarinnar, at vera ein banning, og ein øtan, og ein fising, og ein skemd, alra teirra tjóða millum, hvagar eg havi rikið teir:

19 Av tí at teir hava ikki lýtt á míni orð, sigur HARRIN, sum eg sendi at teimum við mínum tænarum prophetunum, rísandi upp árla og sendandi *teir;* men tit vildu ikki hoyra, sigur HARRIN.

20 ¶ Hoyrið tit tessvegna orð HARRANS, allir tit av fangaskapinum, sum[P] eg havi sent frá Jerusalem til Bábylon:

21 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels, um Áhab Kō-lāĭ′-ăh son, og um Zĕd-ē-kī′-ăh Mā-ă-sĕj′-ăh son, sum prophetera eina lygn at tykkum í navni mínum; Sí, eg vil flýggja teir inn í hondina á Nĕ-bŭ-chăd-rēz′-zâr kongi av Bábylon; og hann skal vega teir frammi fyri eygum tykkara;

22 Og av teimum skal verða tikin upp ein bølbiðjing av øllum fangaskapinum av Judah sum *eru* í Bábylon, sigandi, HARRIN geri teg eins og Zĕd-ē-kī′-ăh og eins og Áhab, hvørjar kongurin av Bábylon steikti í eldinum;

23 Av tí at teir hava framt skemdargerð í Ísrael, og hava framt hordóm við ektakonunum hjá næstum sínum, og hava talað lúgvandi orðˇ í navni mínum, sum eg havi ikki skipað teimum; enntá eg veit, og *eri* eitt vitni, sigur HARRIN.

24 ¶ *Svá* skalt tú eisini tala til Sjĕm-āĭ′-ăh Nê-hĕl-ă-mīt′-a, sigandi,

25 Svá talar HARRI herliðanna, Guð Ísraels, sigandi, Av tí at tú hevurt sent brøv í navni tínum at øllum fólkinum sum *eru* í Jerusalem, og til Zê-phăn′-jăh

Mā-ă-sĕj´-ăh sonar prests, og til alra prestanna, sigandi,

26 HARRIN hevur gjørt teg *til* prest í stað Jē-hôi´-ă-dă prests, at tit skuldu vera yvirmenn í húsi HARRANS, fyri hvønn mann *sum er* ørur, og ger seg sjálvan *til* ein prophet, at tú skuldirt seta hann í fongsul, og í stokkin.

27 Nú tessvegna, hví hevurt tú ikki írættasett Jeremiah úr Án´-ă-thōth, sum ger seg sjálvan *til* ein prophet fyri tykkum?

28 Tí at tessvegna sendi hann at okkum *í* Bábylon, sigandi, Hesin *fangaskapur er* langur: byggið tit hús, og búgvið *í teimum;* og plantið urtagarðar, og etið ávøkstin av teimum.

29 Og Zē-phăn´-jăh prestur las hetta bræv í oyru Jeremiah prophets.

30 ¶ Tá kom orð HARRANS at Jeremiah, sigandi,

31 Send til alra teirra av fangaskapinum, sigandi, Svá sigur HARRIN viðvíkjandi Sjĕm-aĭ´-ăh Nē-hĕl-ă-mīt´-a; Vegna tess at Sjĕm-aĭ´-ăh hevur propheterað at tykkum, og eg sendi hann ikki, og hann voldi tykkum at troysta á eina lygn:

32 Tessvegna, svá sigur HARRIN; Sí, eg vil revsa Sjĕm-aĭ´-ăh Nē-hĕl-ă-mīt´-a, og sáð hans: hann skal ikki hava mann til at búgva millum hesa fólks; eiheldur skal hann skoða tað góða sum eg vil gera fyri fólk mítt, sigur HARRIN; av tí at hann hevur frálært uppreist ímóti HARRANUM.

KAPITUL 30

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah frá HARRANUM, sigandi,

2 Svá talar HARRIN Guð Ísraels, sigandi, Skriva tær øll orðini, sum eg havi talað við teg, í eina bók.

3 Tí at sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at eg vil føra aftur fangaskapin av fólki mínum Ísrael og Judah, sigur HARRIN: og eg vil elva teimum at venda aftur til landið sum eg gav til teirra fedrar, og teir skulu ognast tað.

4 ¶ Og hesi *eru* orðini sum HARRIN talaði viðvíkjandi Ísrael og viðvíkjandi Judah.

5 Tí at svá sigur HARRIN; Vit hava hoyrt eina rødd av nøtran, av ótta og ikki av friði.

6 Spyrjið tit nú, og vitið hvørt ein maður verkjast við barn? hví síggi eg hvønn mann við hondum sínum á lendum sínum, eins og ein kvinna í verkjum, og øll andlit eru skift yvirí bleikleika?

7 Akk! tí at hasin dagur *er* mikil, so at eingin *er* líka *sum* hann: tað *er* enntá tíðin av trongd Jákobs; men hann skal verða frelstur út úr tí.

8 Tí at tað skal bera á í tí degi, sigur HARRI herliðanna, *at* eg vil bróta hans ok uttan av hálsi tínum, og vil bresta bond tíni, og fremmandir skulu ei meira tæna sær sjálvum av honum:

9 Men teir skulu tæna HARRANUM Guði sínum, og Dávidi kongi sínum, hvønn eg vil reisa teimum upp.

10 ¶ Tessvegna óttast tú ikki, O tænari mín Jákob, sigur HARRIN; eiheldur ver mótfallin, O Ísrael: tí at sí, eg vil frelsa teg fjar*veg*is frá, og títt sáð frá landinum av teirra fangaskapi; og Jákob skal venda aftur, og skal vera í hvílu, og vera kvirrur, og eingin skal gera *hann* ræddan.

11 Tí at eg *eri* við tær, sigur HARRIN, til *tess* at frelsa teg: tó *at* eg geri ein fullan enda á øllum tjóðum, hvagar eg havi spjatt teg, tó vil eg ikki gera ein fullan enda á tær: men eg vil rættleiða teg í máti, og vil ikki eftirlata teg heilt órevsaðan.

12 Tí at svá sigur HARRIN, Títt meiðsl *er* ógrøðiligt, *og* sár títt *er* herviligt.

13 *Tað er* eingin at føra tína
søk, at tú mást verða bundin um:
tú hevurt ongar grøðandi heili-
vágir.
14 Allir tínir elskarar hava
gloymt teg; teir søkja teg ikki;
tí at eg havi sært teg við sárinum
hjá einum fígginda, við agingini
av einum grimmum ēinum, fyri
fjøldina av tíni misgerð; *av tí at*
tínar syndir vóru øktar.
15 Hví rópart tú fyri nívd tína?
tín sorg *er* ólekilig fyri fjøldina av
tíni misgerð: *av tí at* tínar syndir
vóru øktar, havi eg gjørt hesi ting
at tær.
16 Tí skulu allir teir, sum
upptæra teg, verða upptærdir; og
allir tínir mótstandarar, hvør *og*
ēin av teimum, skulu fara inn í
fangaskap; og teir, sum ræna teg,
skulu verða eitt rán, og allar, sum
herja uppá teg, vil eg geva til ein
ránsfong.
17 Tí at eg vil endurbøta heilsu
at tær, og eg vil grøða teg av sár-
um tínum, sigur HARRIN; av tí at
teir kallaðu teg ein Útstoyttan,
sigandi, Hetta *er* Zion, hvørjum
eingin maður søkir eftir.
18 ¶ Svá sigur HARRIN; Sí,
eg vil føra aftur fangaskapin av
tjøldum Jákobs, og hava miskunn
yvir bústaðir hans; og borgin skal
verða bygd uppá hennara egnu
rúgvu, og slottið skal verða ver-
andi eftir háttarlagi tess.
19 Og út úr teimum skal út-
ganga takkarveitan og røddin á
teimum ið halda at gamni: og
eg vil margfalda teir, og teir skulu
ei verða fáir; eg vil eisini dýrð-
meta teir, og teir skulu ei verða
smáir.
20 Teirra børn eisini skulu vera
sum fyrr í tíðini, og teirra sam-
koma skal verða grundfest fram-
mi fyri mær, og eg vil revsa allar
sum kúga teir.
21 Og teirra tignarmenn skulu
vera av teimum sjálvum, og teirra
landsstjóri skal útganga frá miðj-
um teimum; og eg vil volda hon-
um at dragast nær, og hann skal
nærkast mær: tí at hvør *er* hesin
sum veðsetti sítt hjarta at nærkast
at mær? sigur HARRIN.
22 Og tit skulu vera fólk mítt,
og eg vil vera Guð tykkara.
23 Sí, HARRANS meldurvindur
fer fram við øði, ein áframhald-
andi meldurvindur: hann skal
falla við pínu uppá høvur hinna
vondu.
24 Hin ógvusliga firtni HARR-
ANS skal ikki venda aftur, inntil
hann havi gjørt *tað,* og inntil
hann havi útint endamálini hjá
sínum hjarta: í teimum seinnu
døgunum skulu tit umhugsa tað.

KAPITUL 31

Á HINI somu tíð, sigur HARRIN, vil eg vera Guð
hjá øllum familjum Ísraels, og
teir skulu vera fólk mítt.
2 Svá sigur HARRIN, Fólkið, *sum*
vóru eftir av svørðinum, funnu
náði í oyðuni; *enntá* Ísrael, tá ið
eg fór at volda honum at hvíla.
3 HARRIN hevur birtst at mær
úr forðum, *sigandi,* Ja, eg havi
elskað teg við einum ævigtvarandi
kærleika: tessvegna við elskandi
blídni havi eg drigið teg.
4 Aftur vil eg byggja teg, og tú
skalt verða bygd, O jomfrú Ísra-
els: tú skalt aftur verða prýdd við
tamburīnum tínum, og skalt fara
fram í dansum teirra sum halda
at gamni.
5 Tú skalt enn planta víngarð-
ar uppiá fjøllunum av Să-mâr´-ĭ-ŭ:
plantararnir skulu planta, og skulu
eta *teir* sum algongdar lutir.
6 Tí at ein dagur skal verða, *ið*
varðmenninir uppiá fjallinum Ē´-
phră-ĭm skulu rópa, Reisist tit, og
latum okkum fara niðan til Zion
at HARRANUM Guði várum.
7 Tí at svá sigur HARRIN; Syng-
ið við gleði yvir Jákob, og rópið

millum hinna fremstu av tjóðunum: kunngerið tit, prísið tit, og sigið, O HARRI, frels fólk títt, leivd Ísraels.

8 Sí, eg vil føra teir frá norður landinum, og savna teir frá breddum jarðarinnar, *og* við teimum hin blinda og hin lamna, kvinnuna við barn og hana sum verkjast við barni tilsaman: eitt stórt samlag skal venda aftur hagar.

9 Teir skulu koma við gráti, og við umbøningum vil eg leiða teir: eg vil elva teimum at ganga við løkirnar av vøtnum í einum beinum vegi, hvarí teir ei skulu snáva: tí at eg eri ein faðir fyri Ísrael, og Ē´-phră-ím *er* mín fyrstiføddi.

10 ¶ Hoyrið HARRANS orð, O tit tjóðir, og kunngerið *tað* í oyggjunum langt burturifrá, og sigið, Hann, sum spjaddi Ísrael, vil savna hann, og goyma at honum, sum ein hirði fylgi sítt.

11 Tí at HARRIN hevur endurloyst Jákob, og leyskeypt hann frá hondini á *honum sum var* sterkari enn hann.

12 Tí skulu teir koma og syngja á Zions hædd, og skulu fløða tilsaman til góðsku HARRANS, fyri hveiti, og fyri vín, og fyri olju, og fyri hini ungu smáfæafylgisins og stórfæafylgisins: og teirra sál skal vera sum ein vatnaður urtagarður; og teir skulu ikki syrgja meira yvirhøvur.

13 Tá skal jomfrúgvin fegnast í dansinum, bæði ungir menn og gamlir tilsaman: tí at eg vil venda teirra harman yvirí frøi, og vil ugga teir, og fáa teir *at* fegnast frá síni sorg.

14 Og eg vil nøkta sálina hjá prestunum við fiti, og fólk mítt skal verða mettað við góðsku míni, sigur HARRIN.

15 ¶ Svá sigur HARRIN; Ein rødd varð hoyrd í Rá´-măh, harman, *og* beiskur grátur; Rahel, grátandi vegna barna sína, sýtti at verða uggað yvir børn síni, av tí at tey *vóru* ei.

16 Svá sigur HARRIN, Halt aftur rødd tíni frá gráting, og eygum tínum frá tárum: tí at verk títt skal verða endurgoldið, sigur HARRIN; og tey skulu koma aftur frá landi figgindans.

17 Og tað er vón í enda*lykt* tíni, sigur HARRIN, at tíni børn skulu koma aftur til egna landamark sítt.

18 ¶ Eg havi vissuliga hoyrt Ē´-phră-ím harmandi *yvir* seg sjálvan *soleiðis;* Tú hevurt agað meg, og eg varð agaður, sum ein ungtarvur óvanur *við okið:* vend tú mær, og eg skal verða vendur; tí at tú *ert* HARRIN Guð mín.

19 Vissuliga, eftir at eg var vendur, vendi eg um; og eftir at eg var leiðbeindur, sló eg uppá lær *mítt:* eg skammaðist, ja, enntá fjamskaðist, av tí at eg bar skemdina av mínum ungdómi.

20 *Er* Ē´-phră-ím mín kæri sonur? *er hann* eitt yndisligt barn? tí at síðan eg talaði ímóti honum, minnist eg hann inniliga enn: tí eru mínar innangoymslur órógvaðar yvir hann; eg vil vissuliga hava miskunn yvir hann, sigur HARRIN.

21 Set tær upp vegmerkir, ger tær høgar rúgvur: set títt hjarta ímóti alfaraveginum, *enntá* veginum *sum* tú fórt: vend aftur, O jomfrú Ísraels, vend aftur til hesar staðir tínar.

22 ¶ Hvussu leingi vilt tú fara umkring, O tú fráfallandi dóttir? tí at HARRIN hevur skapað eitt nýtt ting á jørðini, Ein kvinna skal umringa ein mann.

23 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sum enn *er* skulu teir brúka hesa talu í landi Judah og í staðum tess, tá ið eg skal føra aftur teirra fangaskap; HARRIN vælsigni teg, O rættlætis býli, *og* heilagleiks fjall.

24 Og tað skulu búgva í Judah sjálvum, og í øllum tess staðum tilsaman, jarðyrkismenn, og teir *sum* fara út við fylgjum.

25 Tí at eg havi nøktað hina útmøddu sál, og eg havi fylt hvørja sorgfulla sál.

26 Við hetta vaknaði eg, og skoðaði; og mín svøvnur var søtur at mær.

27 ¶ Sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at eg vil sáa hús Ísraels og hús Judah við sáði mans, og við sáði djórs.

28 Og tað skal bera á, *at* líka sum eg havi vakt yvir teimum, til at slíta upp, og at bróta niður, og at kasta niður, og at oyða, og at níva; soleiðis vil eg vaka yvir teimum, til at byggja, og at seta niður, sigur HARRIN.

29 Í teimum døgum skulu teir ei meira siga, Fedrarnir hava etið eina súra víndrúvu, og tenninar hjá børnunum eru fingnar at tirra.

30 Men hvør *og* ēin skal doyggja fyri sína egnu misgerð: hvør maður sum etur hina súru víndrúvu, hansara tenn skulu verða fingnar at tirra.

31 ¶ Sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at eg vil gera ein nýggjan sáttmála við Ísraels hús, og við Judah hús:

32 Ikki samsvarandi við sáttmálan sum eg gjørdi við teirra fedrar í tí degi *sum* eg tók í teirra hond at føra teir út úr Egyptalandi; hvønn sáttmála mín teir brutu, hóast eg var teimum ein ektamaður, sigur HARRIN:

33 Men hesin *skal vera* sáttmálin sum eg vil gera við Ísraels hús; Eftir teir dagarnar, sigur HARRIN, vil eg leggja mína lóg í teirra innvortis partar, og skriva hana í teirra hjørtu; og vil vera Guð teirra, og teir skulu vera fólk mítt.

34 Og teir skulu ei meira læra hvør maður næsta sín, og hvør maður bróður sín, sigandi, Kenn-ið HARRAN: tí at teir skulu allir kenna meg, frá hinum minsta av teimum at tí miklasta av teimum, sigur HARRIN: tí at eg vil fyrigeva teirra misgerð, og eg vil minnast teirra synd ei meira.

35 ¶ Svá sigur HARRIN, sum gevur sólina til eitt ljós um dag*in, og* regluskipanirnar hjá mánanum og hjá stjørnunum til eitt ljós um nátt*ina,* sum skilur sjógvin tá ið aldur hans ýla; HARRI herliðanna *er* hans navn:

36 Um hasar regluskipanir víki frammi fyri mær ífrá, sigur HARRIN, *tá* skal sáð Ísraels eisini halda uppat frá at vera ein tjóð frammi fyri mær um ævir.

37 Svá sigur HARRIN; um himin í erva kann verða mátaður, og grundvøllir jarðarinnar grundaðir út í neðra, *tá* vil eg eisini kasta av alt sáð Ísraels fyri alt sum teir hava gjørt, sigur HARRIN.

38 ¶ Sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at staðurin skal verða bygdur fyri HARRANUM frá Hăn-ă-nēēl-s-torninum at hjørna-portrinum.

39 Og mátilinjan skal enn fara fram yvir ímóti tí uppiá heygnum Gâr-ĕb, og skal kringfara íkring til Gō-ăth.

40 Og allur dalurin av teimum deyðu kroppunum, og av øskunum, og allir akrarnir at áarløki Kī-drŏn-s, at hjørninum á hestportrinum ímóti eystri, *skal vera* HARRANUM heilagt; tað skal ei verða slitið upp, ella kastað niður meira um ævir.

KAPITUL 32

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah frá HARRANUM í tí tíggjunda árinum hjá Zĕd-ĕ-kī-ăh kongi av Judah, sum *var* hitt átjanda árið hjá Nĕ-bŭ-chăd-rēz-zâr-i.

2 Tí at tá kringsetti herurin hjá kongi Bábylons Jerusalem: og

Jeremiah prophetur varð lokaður inni í forgarðinum av fongslinum, sum *var* í húsi kongsins av Judah.
3 Tí at Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongur av Judah hevði lokað hann inni, sigandi, Hvørsvegna propheterart tú, og sigurt, Svá sigur HARRIN, Sí, eg vil geva henda stað inn í hondina á kongi Bábylons, og hann skal taka hann;
4 Og Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongur av Judah skal ikki komast undan út úr hondini á Chăl-dē´-unum, men skal vissuliga verða flýggjaður inn í hondina á kongi Bábylons, og skal tala við hann munn til munn, og hans eygu skulu skoða eygu hans;
5 Og hann skal leiða Zĕd-ĕ-kī´-ăh til Bábylon, og har skal hann vera inntil eg heimsøki hann, sigur HARRIN: tó *at* tit berjist við Chăl-dē´-arnar, skulu tit ikki hava framgongd?
6 ¶ Og Jeremiah segði, Orð HARRANS kom at mær, sigandi,
7 Sí, Hăn´-ă-mēēl, sonur Sjăl´-lŭm-s, faðirbróður tíns, skal koma at tær, sigandi, Keyp tær akur mín, sum *er* í Án´-ă-thōth: tí at endurloysingar-rætturin *er* tín at keypa *hann*.
8 So Hăn´-ă-mēēl, sonur faðirbróður míns, kom til mín í forgarðinum av fongslinum samsvarandi við orð HARRANS, og segði við meg, Keyp akur mín, eg biði teg, sum *er* í Án´-ă-thōth, sum *er* í landi Benjamins: tí at arvsrætturin *er* tín; og endurloysingin *er* tín; keyp *hann* til tín sjálvs. Tá vitsti eg, at hetta *var* orð HARRANS.
9 Og eg keypti akurin av Hăn´-ă-mēēl-i, syni faðirbróður míns, sum *var* í Án´-ă-thōth, og vigaði honum peningin, *enntá* seytjan sjē´-kl-ar av silvuri.
10 Og eg undirskrivaði prógvið, og innsiglaði *tað*, og tók vitnir, og vigaði *honum* peningin í vágskálunum.
11 So eg tók keypsprógvið, *bæði* tað sum var innsiglað *samsvarandi* við lógina og venjuna, og tað sum var opið:
12 Og eg gav keypsprógvið at Bár´-ŭch-i Nē´-rī-ăh syni, Mā-ă-sēj´-ăh syni, í eygsjón Hăn´-ă-mēēl-s, *sonar* faðirbróður míns, og í nærveruni av vitnunum sum undirskrivaðu keypsbókina, frammi fyri øllum Jødunum sum sótu í forgarðinum av fongslinum.
13 ¶ Og eg álegði Bár´-ŭch-i frammi fyri teimum, sigandi,
14 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Tak hesi prógv, hetta prógvið um keypið, bæði sum er innsiglað, og hetta prógv sum er opið; og koyr tey í eitt leirker, at tey mega halda áfram mangar dagar.
15 Tí at svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Hús˘ og akrar og víngarðar skulu verða ognað aftur í hesum landi.
16 ¶ Nú, tá ið eg hevði flýggjað keypsprógvið at Bár´-ŭch-i Nē´-rī-ăh syni, bað eg at HARRANUM, sigandi,
17 Á, Harri GUÐ! sí, tú hevurt gjørt himinin og jørðina við tínum mikla mátti og útrætta armi, *og* einkið er ov torført hjá tær:
18 Tú sýnirt elskandi blídni at túsundum, og endurrindart misgerð fedranna inn í barm barna teirra eftir teir: hin Mikli, hin Mektigi Guð, HARRI herliðanna, *er* hans navn,
19 Mikil í ráði, og mektigur í verki: tí at eygu tíni *eru* opin omanyvir allar vegirnar hjá mannasonunum: at geva hvørjum *og* ēinum samsvarandi við vegir hansara, og samsvarandi við ávøkstin av gerðum hansara:
20 Sum hevurt sett tekin˘ og undur˘ í Egyptalandi, *alt* at hesum degi, og í Ísrael, og millum *aðrar* menn; og hevurt gjørt tær eitt navn, sum á hesum degi;

21 Og hevurt ført fram fólk títt Ísrael út úr Egyptalandi við tekinum, og við undurum, og við eini sterkari hond, og við einum útrættum armi, og við miklari ræðslu;
22 Og hevurt givið teimum hetta land, hvørt tú svórt fyri teirra fedrum at geva teimum, eitt land — fløðandi við mjólk og hunangi;
23 Og teir komu inn, og ognaðust tað; men teir lýddu ikki tína rødd, eiheldur gingu í lóg tíni; teir hava gjørt einkið av øllum sum tú ábeyðst teimum at gera: tí hevurt tú volt øllum hesum illa at koma uppá teir:
24 Sí virkisgarðarnar, teir eru komnir at staðinum at taka hann; og staðurin er givin inn í hondina á Chăl-dē´-unum, sum berjast ímóti honum, orsakað av svørðinum, og av hungursneyðini, og av drepsóttini: og tað, *ið* tú hevurt talað, er borið á; og sí, tú sært *tað*.
25 Og tú hevurt sagt við meg, O Harri GUÐ, Keyp tær akurin fyri pening, og tak vitnir; tí at staðurin er givin inn í hondina á Chăl-dē´-unum.
26 ¶ Tá kom orð HARRANS at Jeremiah, sigandi,
27 Sí, eg *eri* HARRIN, Guð˜ hjá øllum kjøti: er nakað ov torført hjá mær?
28 Tessvegna, svá sigur HARRIN; Sí, eg vil geva henda stað inn í hondina á Chăl-dē´-arunum, og inn í hondina á Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongi av Bábylon, og hann skal taka hann:
29 Og Chăl-dē´-ararnir, sum berjast ímóti hesum staði, skulu koma og seta eld á henda stað, og brenna hann við húsunum, uppiá hvørs tøkum teir hava ofrað roykilsi at Bā´-ăl-i, og helt út drykkoffur˜ at øðrum gudum, at tirra meg til firtnis.
30 Tí at Ísraels børn og Judah børn hava einans gjørt ilt frammi fyri mær frá sínum ungdómi: tí at Ísraels børn hava einans tirrað meg til firtnis við verki handa sína, sigur HARRIN.
31 Tí at hesin staðurin hevur verið fyri mær *sum* ein tirring av míni firtni og av míni øði frá tí degi sum teir bygdu hann, alt at hesum degi; at eg skuldi firrað hann frá *at vera* frammi fyri andliti mínum,
32 Uppá grund av øllum tí illa hjá børnum Ísraels og hjá børnum Judah, sum teir hava gjørt til at tirra meg til firtnis, teir, teirra kongar, teirra prinsar, teirra prestar, og teirra prophetar, og menninir av Judah, og íbúgvar Jerusalems.
33 Og teir hava vent at mær bakið, og ikki andlitið: tó *at* eg lærdi teir, rísandi upp tíðliga og lærandi *teir,* tó hava teir ikki lýtt á, til at taka við leiðbeining.
34 Men teir settu sínar andstygdir í húsið, sum er kallað við navni mínum, at dálka tað.
35 Og teir bygdu hini høgu pláss Bā´-ăl-s, sum *eru* í dali Hín´-nŏm-s sonar, til at volda sonum sínum og døtrum sínum at fara ígjøgnum *eldin* at Molechi; hvørt eg skipaði teimum ikki, eiheldur kom tað inn í mín huga, at teir skuldu gera hesa andstygd, at elva Judah at synda.
36 ¶ Og nú tessvegna, svá sigur HARRIN, Guð Ísraels, viðvíkjandi hesum staði, um hvønn tit siga, Hann skal verða flýggjaður inn í hondina á konginum av Bábylon við˜ svørðinum, og við˜ hungursneyðini, og við˜ drepsóttini;
37 Sí, eg vil savna teir burtur úr øllum londum, hvagar eg havi rikið teir í míni firtni, og í míni øði, og í miklari vreiði; og eg vil føra teir aftur at hesum plássi, og eg vil elva teimum at búgva tryggliga:

38 Og teir skulu vera fólk mítt, og eg vil vera Guð teirra:
39 Og eg vil geva teimum ēitt hjarta, og ēin veg, at teir mega óttast meg um ævir, til teirra góða, og barna teirra eftir teir:
40 Og eg vil gera ein ævigtvarandi sáttmála við teir, at eg vil ikki venda burtur frá teimum, at gera teimum gott; men eg vil leggja mín ótta í teirra hjørtu, at teir skulu ikki víkja frá mær.
41 Ja, eg vil fegnast yvir teimum til at gera teimum gott, og eg vil planta teir í hesum landi vissuliga við heila mínum hjarta og við allari míni sál.
42 Tí at svá sigur HARRIN; Líka sum eg havi ført alt hetta illa uppá hetta fólk, soleiðis vil eg føra uppá teir alt tað góða sum eg havi fyrijáttað teimum.
43 Og akrar skulu verða keyptir í hesum landi, um hvørt tit siga, *Tað er* oyði uttan mann ella djór; tað er givið inn í hondina á Chăldē´unum.
44 Menn skulu keypa akrar fyri pening, og skriva undir prósannanir og innsigla *tær*, og fáa *sær* vitnir í landi Benjamins, og í plássunum kring Jerusalem, og í staðunum av Judah, og í staðum fjallanna, og í staðum dalsins, og í staðum suðursins: tí at eg vil volda teirra fangaskapi at venda aftur, sigur HARRIN.

KAPITUL 33

HARAFTURAT kom orð HARRANS at Jeremiah á øðrum sinni, meðan hann var enn lokaður inni í forgarðinum av fongslinum, sigandi,
2 Svá sigur HARRIN, skapari tess; HARRIN, sum myndaði tað, til at grundfesta tað; HARRIN *er* hans navn;
3 Kalla á meg, og eg vil svara tær, og sýna tær mikil og mektig ting, sum tú veitst ikki.
4 Tí at svá sigur HARRIN, Guð Ísraels, viðvíkjandi húsunum av hesum staði, og viðvíkjandi húsunum hjá kongunum av Judah, sum eru kastaði niður viðˆ virkisgørðunum, og viðˆ svørðinum;
5 Teir koma til *tess* at berjast við Chăl-dē´-ararnar, men *tað er* til at fylla teir við teimum deyðu kroppunum av monnum, hvørjar eg havi vigið í míni firtni og í míni øði, og fyri alla hvørs vondsku eg havi fjalt mítt andlit fyri hesum staði.
6 Sí, eg vil bera honum heilsu og leking, og eg vil lekja teir, og vil opinbera teimum ríkiligsemina av friði og sannleika.
7 Og eg vil elva fangaskapinum av Judah og fangaskapinum av Ísrael at venda aftur, og vil byggja teir, sum í fyrstani.
8 Og eg vil reinsa teir frá allari teirra misgerð, viðˆ hvørji teir hava syndað ímóti mær; og eg vil náða allar teirra misgerðir, viðˆ hvørjum teir hava syndað, og viðˆ hvørjum teir hava misbrotið ímóti mær.
9 ¶ Og hann skal vera fyri mær eitt frøisnavn, eitt lov og ein heiður frammi fyri øllum tjóðum jarðarinnar, sum skulu hoyra alt tað góða sum eg geri at teimum: og tær skulu óttast og skelva fyri alla ta góðsku og fyri alla ta framgongd sum eg útvegi honum.
10 Svá sigur HARRIN; Aftur skal tað hoyrast í hesum plássi, sum tit siga *skal vera* oyði uttan mann og uttan djór, *enntá* í staðunum av Judah, og í gøtum Jerusalems, sum eru oyðin, uttan mann, og uttan íbúgva, og uttan djór,
11 Røddin av frøi, og røddin av gleði, røddin á brúðgóminum, og røddin á brúðrini, røddin á teimum ið skulu siga, Prísið HARRA herliðanna: tí at HARRIN *er* góður; tí hansara miskunn *varir* um ævir: *og* á teimum sum skulu

bera *lovprísing*ar-sláturofrið inn í hús HARRANS. Tí at eg vil elva at venda aftur fangaskapi landsins, sum í fyrstani, sigur HARRIN.

12 Svá sigur HARRI herliðanna; Aftur í hesum plássi, sum er oyði uttan mann og uttan djór, og í øllum staðum tess, skal vera eitt býli hjá hirðum, fáandi *síni* fylgir at leggjast niður.

13 Í staðum fjallanna, í staðum dalsins, og í staðum suðursins, og í landi Benjamins, og í plássunum kring Jerusalem, og í staðunum av Judah, skulu fylgini ferðast aftur undir hondunum á honum sum telur *tey,* sigur HARRIN.

14 Sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at eg vil útinna hatta góða ting, sum eg havi fyrijáttað húsi Ísraels og fyri húsi Judah.

15 ¶ Í teimum døgum, og við ta tíð, vil eg elva rættvísis Greinini at vaksa upp yvirfyri Dávidi; og hann skal útinna dóm og rættvísi í landinum.

16 Í teimum døgum skal Judah verða frelst, og Jerusalem skal búgva tryggliga: og hetta *er navnið,* við hvørjum hon skal verða kallað, HARRIN okkara rættvísi.

17 ¶ Tí at svá sigur HARRIN; Dávidi skal aldri vanta ein mann at sita uppiá hásæti Ísraels húss;

18 Eiheldur skal prestunum, Levitunum, vanta ein mann frammi fyri mær at ofra brennioffur˘, og at kynda matoffur˘, og at gera sláturofran áframhaldandi.

19 ¶ Og HARRANS orð kom at Jeremiah, sigandi,

20 Svá sigur HARRIN; Um tit kunnu bróta mín sáttmála dagsins, og mín sáttmála náttarinnar, og at tað skuldi ikki verðið dagur og nátt í teirra tíð;

21 *Tá* kann eisini mín sáttmáli verða brotin við Dávid, mín tænara, at hann skuldi ikki hava ein son at ríkja uppiá hásæti sínum; og við Levitarnar, prestarnar, mínar tænarar.

22 Eins og herlið himins kann ikki verða upptalt, eiheldur sandur havsins mátaður: soleiðis vil eg margfalda sáð Dávids, tænara míns, og Levitarnar sum tæna at mær.

23 Harafturat kom orð HARRANS til Jeremiah, sigandi,

24 Umhugsart tú ikki hvat hetta fólk hava talað, sigandi, Tær tvær familjur, sum HARRIN hevur valt, hann hevur enntá kastað tær av? svá hava tey vanvirt fólk mítt, at teir skuldu ei meira vera ein tjóð frammi fyri teimum.

25 Svá sigur HARRIN; Um mín sáttmáli *veri* ikki við dag og nátt, *og um* eg havi ikki ásett regluskipanir himins og jarðar;

26 Tá vil eg kasta burtur sáð Jákobs, og Dávid mín tænara, *so* at eg vil ikki taka *nakrar* av hansara sáði *til at vera* stjórnarar yvir sáði Ábrahams, Ísaaks, og Jákobs: tí at eg vil elva teirra fangaskapi at venda aftur, og hava miskunn yvir teir.

KAPITUL 34

ORÐIÐ, sum kom at Jeremiah frá HARRANUM, tá ið Nĕ-bŭ-ch̲ăd-nēz´-zâr kongur av Bábylon, og allur hans herur, og øll kongadømir jarðarinnar av harradømi hans, og alt fólkið, bardust ímóti Jerusalem, og ímóti øllum staðum tess, sigandi,

2 Svá sigur HARRIN, Guð Ísraels; Far og tala til Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongs av Judah, og sig honum, Svá sigur HARRIN; Sí, eg vil geva henda stað inn í hondina á kongi Bábylons, og hann skal brenna hann við eldi:

3 Og tú skalt ikki komast undan út úr hond hansara, men skalt vissuligani verða tikin, og flýggjaður inn í hond hansara; og tíni eygu skulu skoða eygu kongsins

av Bábylon, og hann skal tala við teg munn til munn, og tú skalt fara til Bábylon.

4 Tó hoyr orð HARRANS, O Zĕd-ē-kī´-ăh kongur av Judah; Svá sigur HARRIN um teg, Tú skalt ikki doyggja viðˆ svørðinum:

5 *Men* tú skalt doyggja í friði: og við brenningunum hjá fedrum tínum, hinum fyrru kongum sum vóru undan tær, soleiðis skulu teir brenna *angilsir* fyri teg; og tey vilja harma teg, *sigandi,* Á, harri! tí at eg havi lýst orðið, sigur HARRIN.

6 Tá talaði Jeremiah prophetur øll hesi orð við Zĕd-ē-kī´-ăh kong av Judah í Jerusalem,

7 Tá ið herurin hjá konginum av Bábylon bardist ímóti Jerusalem, og ímóti øllum staðunum av Judah sum vóru eftir, ímóti Lá´-chīsj, og ímóti Ā-zē´-kăh: tí at hesir víggirdu staðir vóru verandi av staðunum av Judah.

8 ¶ *Hetta er* orðið sum kom at Jeremiah frá HARRANUM, eftir at kongurin Zĕd-ē-kī´-ăh hevði gjørt ein sáttmála við øll fólkini sum *vóru* í Jerusalem, at lýsa frælsi at teimum;

9 At hvør maður skuldi lata tænastusvein sín, og hvør maður sína tænastugentu, *sum vóru* ein Hebrēari ella ein Hebrēarinna, fara frí; at eingin skuldi tæna sær sjálvum av teimum, *tað vil siga,* av einum Jøda, bróður sínum.

10 Nú, tá ið allir prinsarnir, og alt fólkið, sum høvdu inngingið inn í sáttmálan, hoyrdu, at hvør *og* ēin skuldi lata tænastusvein sín, og hvør *og* ēin sína tænastugentu, fara frí, at eingin skuldi tæna sær sjálvum av teimum meira, tá lýddu teir, og lótu *tey* fara.

11 Men aftaná vendu teir, og voldu tænarunum og tænastumoyggjunum, hvørji teir høvdu latið fara frí, at venda aftur, og førdu tey inn í undirgivni til tænarar og til tænastumoyggjar.

12 ¶ Tí kom orð HARRANS til Jeremiah frá HARRANUM, sigandi,

13 Svá sigur HARRIN, Guð Ísraels; Eg gjørdi ein sáttmála við tykkara fedrar á tí degi sum eg førdi teir fram út úr Egyptalandi, út úr trælmanna-húsinum, sigandi,

14 Við endan á sjey árum latið tit fara hvør maður bróður sín, ein Hebrēara, sum hevur verðið seldur at tær; og tá ið hann hevur tænt tær seks ár, skalt tú lata hann fara frían frá tær: men tykkara fedrar lýddu ikki á meg, eiheldur boygdu oyra sítt.

15 Og tit vóru nú vendir, og høvdu gjørt rætt í eygsjón míni, í at lýsa frælsi hvør maður fyri næsta sínum; og tit høvdu gjørt ein sáttmála frammi fyri mær í húsinum sum er kallað við navni mínum:

16 Men tit vendu og dálkaðu navn mítt, og voldu hvør maður tænara sínum, og hvør maður tænastumoyggj síni, hvørji tit høvdu sett í frælsi við teirra lyst, at venda aftur, og førdu tey inn í undirgivni, at vera tykkum til tænarar og til tænastumoyggjar.

17 Tessvegna, svá sigur HARRIN; Tit hava ikki lýtt á meg, í at lýsa frælsi, hvør *og* ēin fyri bróður sínum, og hvør maður fyri næsta sínum: sí, eg lýsi eitt frælsi til tykkara, sigur HARRIN, til svørðið, til drepsóttina, og til hungursneyðina; og eg vil fáa tykkum at verða firraðar inn í øll kongadømir jarðarinnar.

18 Og eg vil geva menninar sum hava misbrotið sáttmála mín, sum hava ikki útint orðini av sáttmálanum sum teir høvdu gjørt frammi fyri mær, tá ið teir skóru kálvin í tvent, og fóru ímillum partar hansara,

19 Prinsarnar av Judah, og prinsarnar av Jerusalem, hirðmenninar,

og prestarnar, og alt fólk landsins, sum fóru ímillum partarnar av kálvinum;
20 Eg vil enntá geva teir inn í hondina á teirra fíggindum, og inn í hondina á teimum sum søkja teirra lív: og teirra deyðu likam skulu vera til mat hjá fuglum himinsins, og fyri djórum jarðarinnar.
21 Og Zĕd-ĕ-kī´-ăh kong av Judah og hansara prinsar vil eg geva inn í hondina á teirra fíggindum, og inn í hondina á teimum sum søkja teirra lív, og inn í hondina á herinum hjá konginum av Bábylon, sum eru lagstir avstað frá tykkum.
22 Sí, eg vil ábjóða, sigur HARRIN, og volda teimum at venda aftur til henda stað; og teir skulu berjast ímóti honum, og taka hann, og brenna hann við eldi: og eg vil gera staðirnar av Judah *til* eina oyðing uttan íbúgva.

KAPITUL 35

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah frá HARRANUM á døgum Jĕ-hŏĭ´-ă-kĭm-s Jó´-sĭ-ăh sonar, Judah kongs, sigandi,
2 Far at húsi Rê-chăb-ĭt´-anna, og tala við teir, og før teir inn í hús HARRANS, inn í ēitt av kømrunum, og gev teim vín at drekka.
3 Tá tók eg Já-ă-zăn´-jăh Jeremiah son Há-bă-zĭn´-jăh sonar, og brøður hans, og allar synir hans, og heila hús Rê-chăb-ĭt´-anna;
4 Og eg førdi teir inn í hús HARRANS, inn í kamarið hjá sonum Há´-năn-s Ĭg-dăl´-jăh sonar, einum Guðs manni, sum *var* við kamarið hjá prinsunum, sum *var* uppiyvir kamarinum hjá Mā-ă-sĕj´-ăh Sjăl´-lŭm-s syni, hurðarvørðinum:
5 Og eg setti frammanfyri sonunum at húsi Rê-chăb-ĭt´-anna kannur fullar av víni, og bikør, og eg segði við teir, Drekkið tit vín.
6 Men teir søgdu, Vit vilja einkið vín drekka: tí at Jón´-ă-dăb Rē´-chăb-s sonur, faðir okkara, ábjóðaði okkum, sigandi, Tit skulu einkið vín drekka, *hvørki* tit, ella synir tykkara, um ævir:
7 Eiheldur skulu tit byggja hús, ella sáa sáð, ella planta víngarð, ella hava *nakrar:* men allar tykkara dagar skulu tit búgva í tjøldum; at tit mega liva mangar dagar í landinum, har tit *veri* fremmandir.
8 Svá hava vit lýtt rødd Jón´-ă-dăb-s Rē´-chăb-s sonar, faðirs okkara, í øllum sum hann hevur álagt okkum, einkið vín at drekka allar dagar okkara, vit, konur okkara, synir okkara, ella døtur okkara;
9 Ella at byggja hús˙ til okkara at búgva í: hvørki hava vit víngarð, ella akur, ella sáð:
10 Men vit hava búð í tjøldum og hava lýtt, og gjørt samsvarandi við alt sum Jón´-ă-dăb, faðir okkara, ábeyð okkum.
11 Men tað bar á, tá ið Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon kom upp inn í landið, at vit søgdu, Komið, og latum okkum fara til Jerusalem av ótta fyri herinum hjá Chăl-dē´-arunum, og av ótta fyri herinum hjá Sýriarunum: so vit dvøljast í Jerusalem.
12 ¶ Tá kom orð HARRANS at Jeremiah, sigandi,
13 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Far og sig monnunum av Judah og íbúgvunum av Jerusalem, Vilja tit ikki taka við leiðbeining at lýða á míni orð? sigur HARRIN.
14 Orðini hjá Jón´-ă-dăb Rē´-chăb-s syni, sum hann ábjóðaði sonum sínum ikki at drekka vín, eru framd; tí at *fram*at hesum degi drekka teir einkið, men lýða ábjóðing faðirs síns: hóast hetta, eg havi talað við tykkum, rísandi árla og talandi; men tit lýddu ikki á meg.

15 Eg havi sent eisini at tykkum allar mínar tænarar prophetarnar, rísandi upp árla og sendandi *teir,* sigandi, Vendið tit aftur nú hvør maður frá illa vegi sínum, og bøtið um tykkara gerðir, og farið ikki eftir øðrum gudum at tæna teimum, og tit skulu búgva í landinum sum eg havi givið til tykkara og til tykkara fedrar: men tit hava ikki boygt oyra tykkara, ella lýtt á meg.

16 Av tí at synirnir hjá Jón-ă-dăb Rē-chăb-s syni hava útint ábjóðing faðirs síns, sum hann ábjóðaði teimum; men hetta fólk hevur ikki lýtt á meg:

17 Tessvegna, svá sigur HARRIN Guð herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil føra uppá Judah og uppá allar íbúgvarnar av Jerusalem alt tað illa sum eg havi lýst ímóti teimum: av tí at eg havi talað við teir, men teir hava ikki hoyrt; og eg havi kallað á teir, men teir hava ikki svarað.

18 ¶ Og Jeremiah segði við hús Rē-chăb-īt-anna, Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Av tí at tit hava lýtt ábjóðingina hjá Jón-ă-dăb-i, faðir tykkara, og hildið allar hansara forskriftir, og gjørt sambært øllum sum hann hevur áboðið tykkum:

19 Tessvegna, svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Jón-ă-dăb Rē-chăb-s syni skal ikki vanta ein mann til at standa frammi fyri mær um ævir.

KAPITUL 36

OG tað bar á í hinum fjórða ári Jē-hŏi-ă-kĭm-s Jó-sī-ăh sonar, Judah kongs, *at* hetta orðið kom at Jeremiah frá HARRANUM, sigandi,

2 Tak tær eina bókarrullu, og skriva harí øll orðini sum eg havi talað við teg ímóti Ísrael, og ímóti Judah, og ímóti øllum tjóðunum, frá tí degi *sum* eg talaði við teg, frá døgum Jó-sī-ăh, alt at hesum degi.

3 Vera má, at Judah hús vil hoyra alt tað illa sum eg ætli at gera teimum; at teir mega venda aftur hvør maður frá illa vegi sínum; at eg má fyrigeva teirra misgerð og teirra synd.

4 Tá kallaði Jeremiah Bár-ŭch Nē-rī-ăh son: og Bár-ŭch skrivaði frá munni Jeremiah øll orðini hjá HARRANUM, hvørji hann hevði talað við hann, uppá eina bókarrullu.

5 Og Jeremiah ábeyð Bár-ŭch-i, sigandi, Eg *eri* lokaður inni; eg kann ikki fara inn í hús HARRANS:

6 Tessvegna far tú, og les í rulluni, hvørja tú hevurt skrivað frá munni mínum, orðini hjá HARRANUM í oyruni á fólkinum í húsi HARRANS uppá føstu dagin: og tú eisini skalt lesa tey í oyruni á øllum Judah, sum koma út úr staðum sínum.

7 Vera má, *at* teir vilji frambera sína umbøning framfyri HARRAN, og vilji venda aftur hvør *og* ēin frá illa vegi sínum: tí at mikil *er* firtnin og øðin, sum HARRIN hevur lýst ímóti hesum fólki.

8 Og Bár-ŭch Ne-rí-ah sonur gjørdi samsvarandi við alt sum Jeremiah prophetur ábeyð honum, lesandi í bókini orðini hjá HARRANUM í húsi HARRANS.

9 Og tað bar á í hinum fimta ári Jē-hŏi-ă-kĭm-s Jó-sī-ăh sonar, Judah kongs, í hinum níggjunda mánaði, *at* teir lýstu eina føstu frammi fyri HARRANUM fyri øllum fólkinum í Jerusalem, og fyri øllum fólkinum sum kom frá staðunum av Judah at Jerusalem.

10 Tá las Bár-ŭch í bókini orðini av Jeremiah í húsi HARRANS, í herberginum hjá Gĕ-măr-jăh Sjá-phăn-s syni tí skriftlærda, í tí hægra forgarðinum, við inngongdina av tí nýggja portrinum av húsi

HARRANS, í oyruni á øllum fólkinum.

11 ¶ Tá ið Mī-chāĭ´-āh Gĕ-măr´-jāh sonur, Sjá´-phăn-s sonar, hevði hoyrt úr bókini øll orðini hjá HARRANUM,

12 Tá fór hann oman í kongshúsið, inn í herbergið hjá tí skriftlærda: og sí, allir prinsarnir sótu har, *enntá* Ê-lī-sjá´-mă hin skriftlærdi, og Dĕl-āĭ´-āh Sjĕm-āĭ´-āh sonur, og Ĕl´-nâ-thăn Āch´-bŏr-s sonur, og Gĕ-măr´-jāh Sjá´-phăn-s sonur, og Zĕd-ĕ-kī´-āh Hă-năn´-jāh sonur, og allir prinsarnir.

13 Tá kunngjørdi Mī-chāĭ´-āh yvirfyri teimum øll orðini sum hann hevði hoyrt, tá ið Bár´-ūch las bókina í oyru fólksins.

14 Tí sendu allir prinsarnir Jĕhū´-dī Nĕ-thăn´-jāh son, Sjĕl-ĕ-mī´-āh sonar, Cū´-sjī-s sonar, at Bár´-ūch-i, sigandi, Tak í tína hond rulluna, í hvørji tú hevurt lisið í oyruni á fólkinum, og kom. So Bár´-ūch Nē´-rī-āh sonur tók rulluna í sína hond, og kom at teimum.

15 Og teir søgdu við hann, Setst niður nú, og les hana í okkar oyru. So Bár´-ūch las *hana* í teirra oyru.

16 Nú, tað bar á, tá ið teir høvdu hoyrt øll orðini, vórðu teir ræddir, bæði ēin og annar, og søgdu við Bár´-ūch, Vit vilja vissuliga siga kongi um øll hesi orð.

17 Og teir spurdu Bár´-ūch, sigandi, Sig okkum nú, Hvussu skrivaðirt tú øll hesi orðini við munn hansara?

18 Tá svaraði Bár´-ūch teimum, Hann lýsti mær øll hesi orð við munni sínum, og eg skrivaði *tey* við blekki í bókina.

19 Tá søgdu prinsarnir við Bár´-ūch, Far, fjal teg, tú og Jeremiah; og lat ongan mann vita hvar tit veri.

20 ¶ Og teir fóru inn til kong inn í forgarðin, men teir løgdu niðurfyri rulluna í herbergið hjá Ê-lī-sjá´-mă tí skriftlærda, og søgdu øll orðini í oyruni hjá kongi.

21 So kongur sendi Jĕ-hū´-dī at heinta rulluna: og hann tók hana út úr herberginum hjá Ê-lī-sjá´-mă tí skriftlærda. Og Jĕ-hū´-dī las hana í oyruni hjá kongi, og í oyruni á øllum prinsunum sum stóðu við síðuna av kongi.

22 Nú, kongur sat í vetrarhúsinum í tí níggjunda mánaðinum: og *tað var ein eldur* á grúgvuni, brennandi frammanfyri honum.

23 Og tað bar á, *at* tá ið Jĕ-hū´-dī hevði lisið trý ella fýra bløð, skar hann hana við pennaknívinum, og kastaði *hana* inn í eldin sum *var* á grúgvuni, inntil øll rullan var upptærd í eldinum sum *var* á grúgvuni.

24 Tó vórðu teir ikki ræddir, ella skræddu klæðir síni, *hvørki* kongur, ella nakar av tænarum hansara sum hoyrdu øll hesi orð.

25 Hóast hetta, Ĕl´-nâ-thăn og Dĕl-āĭ´-āh og Gĕ-măr´-jāh høvdu gjørt forbøn til kongs, at hann vildi ikki brenna rulluna: men hann vildi ikki hoyra teir.

26 Men kongur ábeyð Jĕ-ráh´-mē-ĕl Hăm´-mĕ-lĕch-s syni, og Sĕ-rāĭ´-āh Āz´-rī-ĕl-s syni, og Sjĕl-ĕ-mī´-āh Āb´-dē-ĕl-s syni, at taka Bár´-ūch hin skriftlærda og Jeremiah prophet: men HARRIN fjaldi teir.

27 ¶ Tá kom orð HARRANS til Jeremiah, eftir at kongurin hevði brent rulluna, og orðini sum Bár´-ūch skrivaði við munn Jeremiah, sigandi,

28 Tak tær aftur eina aðra rullu, og skriva í hana øll hini fyrru orðini sum vóru í hini fyrstu rullu, sum Jĕ-hōĭ´-ă-kīm, kongur Judah, hevur brent.

29 Og tú skalt siga til Jĕ-hōĭ´-ă-kīm-s kongs av Judah, Svá sigur HARRIN; Tú hevurt brent hesa rullu, sigandi, Hví hevurt tú skrivað harí, sigandi, Kongurin av Bábylon skal vissuliga koma og

oyða hetta land, og skal volda at halda uppat haðani mann og djór?

30 Tessvegna, svá sigur HARRIN um Jĕ-hōĭ´-ă-kĭm kong av Judah; Hann skal ongan hava at sita uppiá hásæti Dávids: og hansara deyða likam skal verða kastað út um dagin til hitan, og um náttina til frostið.

31 Og eg vil revsa hann og hansara sáð og hansara tænarar fyri teirra misgerð; og eg vil føra omanyvir teir, og omanyvir íbúgvarnar av Jerusalem, og omanyvir menninar av Judah, alt tað illa sum eg havi lýst ímóti teimum; men teir lýddu ikki á.

32 ¶ Tá tók Jeremiah eina aðra rullu, og gav hana til Bár´-ūch hin skriftlærda, Nē´-rĭ-ăh son; sum skrivaði harí frá munni Jeremiah øll orð bókarinnar sum Jĕ-hōĭ´-ă-kĭm kongur av Judah hevði brent í eldinum: og tað vórðu løgd aftur at teimum harumframt mong lík orð.

KAPITUL 37

OG kong Zĕd-ĕ-kī´-ăh Jó´-sī-ăh sonur ríkti ístaðin fyri Cô-nī´-ăh Jĕ-hōĭ´-ă-kĭm-s son, hvønn Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon gjørdi *til* kong í landi Judah.

2 Men hvørki hann, ella tænarar hansara, ella fólk landsins, lýddu á orðini hjá HARRANUM, sum hann talaði við^ prophetinum Jeremiah.

3 Og Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongur sendi Jĕ-hū´-căl Sjël-ĕ-mī´-ăh son og Zĕphăn´-jăh Mā-ă-sĕj´-ăh son prest til prophetin Jeremiah, sigandi, Bið nú at HARRANUM Guði várum fyri okkum.

4 Nú, Jeremiah kom inn og fór út millum fólksins: tí at teir høvdu ikki koyrt hann inn í fongsul.

5 Tá var herurin hjá Pharaoh komin fram út úr Egyptalandi: og tá ið Chăl-dē´-arnir, sum kringsettu Jerusalem, hoyrdu tíðindir um teir, fóru teir avstað frá Jerusalem.

6 ¶ Tá kom orð HARRANS at prophetinum Jeremiah, sigandi,

7 Svá sigur HARRIN, Guð Ísraels; Svá skulu tit siga til kongin av Judah, sum sendi tykkum at mær at fregna av mær; Sí, Pharaohs herur, sum er komin fram at hjálpa tykkum, skal venda aftur til Egyptalands inn í egna land teirra.

8 Og Chăl-dē´-arnir skulu koma aftur, og berjast ímóti hesum staði, og taka hann, og brenna hann við eldi.

9 Svá sigur HARRIN; Teipið ikki tykkum sjálvar, sigandi, Chăl-dē´-arnir skulu vissuliga fara avstað frá okkum: tí at teir skulu ikki fara avstað.

10 Tí at tó *at* tit høvdu sligið allan herin hjá Chăl-dē´-arunum, sum berjist ímóti tykkum, og tað vórðu verandi *bert* særdir menn teirra millum, *tó* skuldu teir risið upp hvør maður í tjaldi sínum, og brent henda stað við eldi.

11 ¶ Og tað bar á, at tá ið herurin hjá Chăl-dē´-arunum var loystur upp frá Jerusalem av ótta fyri heri Pharaohs,

12 Tá fór Jeremiah fram út úr Jerusalem til at fara inn í land Benjamins, til at atskilja seg sjálvan haðani í miðjum fólkinum.

13 Og tá ið hann var í portri Benjamins, *var* ein høvuðsmaður av varð*hald*inum har, hvørs navn *var* Ĭ´-rĭ-jăh, sonur Sjël-ĕ-mī´-ăh, sonar Hă-năn´-jăh; og hann tók Jeremiah prophet, sigandi, Tú fellurt burt til Chăl-dē´-anna.

14 Tá segði Jeremiah, *Tað er* falskt; eg falli ikki burt til Chăl-dē´-anna. Men hann lýddi ikki á hann: so Ĭ´-rĭ-jăh tók Jeremiah, og førdi hann til prinsanna.

15 Hvørsvegna prinsarnir vórðu vreiðir við Jeremiah, og slógu

hann, og koyrdu hann í fongsul í húsinum hjá Jónathan tí skriftlærda: tí at teir høvdu gjørt tað *til* fongslið.

16 ¶ Tá ið Jeremiah var innfarin inn í fangatippið, og inn í klevarnar, og Jeremiah hevði verið verandi har mangar dagar;

17 Tá sendi Zĕd-ē-kī´-ăh kongur, og tók hann út: og kongur spurdi hann loyniliga í húsi sínum, og segði, Er *nakað* orð frá HARRANUM? Og Jeremiah segði, Tað er: tí, segði hann, tú skalt verða flýggjaður inn í hondina á kongi Bábylons.

18 Harafturat segði Jeremiah við Zĕd-ē-kī´-ăh kong, Hvat havi eg brotist ímóti tær, ella ímóti tænarum tínum, ella ímóti hesum fólkinum, at tit hava koyrt meg í fongsul?

19 Hvar *eru* nú prophetar tykkara sum prophteraðu at tykkum, sigandi, Kongurin av Bábylon skal ikki koma ímóti tykkum, ella ímóti hesum landinum?

20 Tessvegna hoyr nú, eg biði teg, O harri mín kongur: lat mína umbøning, eg biði teg, verða góðtikna frammi fyri tær; at tú elvi mær ikki at venda aftur til húsar Jónathans hins skriftlærda, at ikki eg doyggi har.

21 Tá beyð Zĕd-ē-kī´-ăh kongur, at teir skuldu líta upp Jeremiah inn í forgarðin av fongslinum, og at teir skuldu geva honum dagliga eitt stykki av breyði út úr gøtu bakarans, inntil øll breyð staðarins vóru brúkt. Svá varð Jeremiah verandi í forgarðinum av fongslinum.

KAPITUL 38

TÁ hoyrdu Sĕph-ăt´-jăh Măt´-tăn-s sonur, og Gĕ-dăl´-jăh Păsj´-ûr-s sonur, og Jū´-căl Sjĕl-ĕ-mī´-ăh sonur, og Păsj´-ûr Măl´-chī-âh sonur, orðini, sum Jeremiah hevði talað við alt fólkið, sigandi,

2 Svá sigur HARRIN, Hann, sum verður verandi í hesum staði, skal doyggja viðˆ svørðinum, viðˆ hungursneyðini, og viðˆ drepsóttini: men hann, sum fer fram til Chăl-dē´-anna, skal liva; tí at hann skal hava sítt lív til eitt býti, og skal liva.

3 Svá sigur HARRIN, Hesin staðurin skal vissuliga verða givin inn í hondina á herinum hjá kongi Bábylons, sum skal taka hann.

4 Tí søgdu prinsarnir við kong, Vit bøna teg, lat henda mann verða tiknan av lívi: tí at soleiðis veikir hann hendurnar á krígsmonnunum sum eru verandi í hesum staði, og hendurnar á øllum fólkinum, í at tala slík orð við teir: tí at hesin maður søkir ikki vælferðina hjá hesum fólki, men skaðan.

5 Tá segði Zĕd-ē-kī´-ăh kongur, Sí, hann *er* í hond tykkara: tí at kongurin *er* ikki *hann sum* kann gera *nakað* ting ímóti tykkum.

6 Tá tóku teir Jeremiah, og kastaðu hann inn í fangatippið hjá Măl´-chī-âh Hăm´-mē-lĕch-s syni, sum *var* í forgarðinum av fongslinum: og teir sigu niður Jeremiah við bondum. Og í fangatippinum *var* einkið vatn, men mýra: so Jeremiah sakk í mýruni.

7 ¶ Nú, tá ið Ē´-bĕd-mē´-lĕch, Ē-thī-ō´-pī-arin, ēin av hirðmonnunum sum var í kongshúsinum, hoyrdi, at teir høvdu koyrt Jeremiah í fangatippið; kongurin tá sitandi í Benjamins-portrinum;

8 Fór Ē´-bĕd-mē´-lĕch fram út úr kongshúsinum, og talaði til kongs, sigandi,

9 Mín harri kongur, hesir menn hava gjørt ilt í øllum sum teir hava gjørt við Jeremiah prophet, hvønn teir hava kastað inn í fangatippið; og hann er líkur til at doyggja av hungri í plássinum har hann er: tí at *tað er* einkið meira breyð í staðinum.

10 Tá ábjóðaði kongur Ē´-bĕd-mē´-lĕch-i Ê-thĭ-ō´-pĭ-ara, sigandi, Tak hiðani tríati menn við tær, og tak upp Jeremiah prophet burtur úr fangatippinum, áður enn hann doyggi.

11 So Ē´-bĕd-mē´-lĕch tók menninar við sær, og fór inn í kongshúsið undir fæhirðsluna, og tók haðani gamlar útslitnar kloddar og gamlar rotnar spjarrar, og seig teir niður við bondum inn í fangatippið til Jeremiah.

12 Og Ē´-bĕd-mē´-lĕch Ê-thĭ-ō´-pĭ-ari segði við Jeremiah, Koyr nú *hesar* gomlu útslitnu kloddar og rotnu spjarrar undir armholur tínar undir bondini. Og Jeremiah so gjørdi.

13 So teir drógu upp Jeremiah við bondum, og tóku hann upp út úr fangatippinum: og Jeremiah varð verandi í forgarðinum av fongslinum.

14 ¶ Tá sendi Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongur, og tók Jeremiah prophet at sær inn í ta triðju inngongdina sum *er* í húsi HARRANS: og kongurin segði við Jeremiah, Eg vil spyrja teg eitt ting; fjal einkið fyri mær.

15 Tá segði Jeremiah við Zĕd-ĕ-kī´-ăh, Um eg kunngeri tær *tað*, vilt tú ikki vissuliga taka meg av lívi? og um eg gevi tær ráð, vilt tú ikki lýða á meg?

16 So Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongur svór loyniligani at Jeremiah, sigandi, *Sum* HARRIN livir, sum gjørdi okkum hesa sál, eg vil ikki taka teg av lívi, eiheldur vil eg geva teg inn í hondina á hesum monnunum sum søkja títt lív.

17 Tá segði Jeremiah við Zĕd-ĕ-kī´-ăh, Svá sigur HARRIN, Guð herliðanna, Guð Ísraels; Um tú vilt vissuligani fara út at prinsunum hjá kongi Bábylons, tá skal sál tín liva, og hesin staður skal ikki verða brendur við eldi; og tú skalt liva, og hús títt:

18 Men um tú vilt ikki fara út til prinsanna hjá kongi Bábylons, tá skal hesin staður verða givin inn í hondina á Chăl-dē´-unum, og teir skulu brenna hann við eldi, og tú skalt ikki komast undan út úr hond teirra.

19 Og Zĕd-ĕ-kī´-ăh kongur segði við Jeremiah, Eg eri ræddur fyri Jødunum sum eru falnir til Chăl-dē´-anna, bara ikki teir avhendi meg inn í hond teirra, og teir háði meg.

20 Men Jeremiah segði, Teir skulu ikki avhenda *teg*. Akta, eg bøni teg, rødd HARRANS, sum eg tali við teg: so skal tað vera væl *statt* hjá tær, og sál tín skal liva.

21 Men um tú sýti at fara fram, hetta *er* orðið sum HARRIN hevur sýnt mær:

22 Og sí, allar kvinnurnar, sum eru eftir í húsinum hjá kongi Judah, *skulu verða* førdar fram til prinsanna hjá kongi Bábylons, og tær *kvinnurnar* skulu siga, Tínir vinir hava koyrt undir teg, og hava havt yvirvág ímóti tær: tínir føtur eru soknir í mýruna, *og* teir eru vendir burt tilbakar.

23 So teir skulu føra út allar konur tínar og børn tíni til Chăl-dē´-anna: og tú skalt ei komast undan út úr hond teirra, men skalt verða tikin við hondini á kongi Bábylons: og tú skalt elva hesum staði at verða brendum við eldi.

24 ¶ Tá segði Zĕd-ĕ-kī´-ăh við Jeremiah, Lat ongan mann vita um hesi orð, og tú skalt ikki doyggja.

25 Men um prinsarnir hoyri, at eg havi talað við teg, og teir komi at tær, og sigi við teg, Kunnger okkum nú hvat tú hevurt sagt við kong, fjal tað ikki frá okkum, og vit vilja ikki taka teg av lívi; eisini hvat kongurin segði við teg:

26 Tá skalt tú siga við teir, Eg framsetti mína forbøn framfyri kong, at hann vildi ikki volda mær at venda aftur til húsar Jónathans, at doyggja har.

27 Tá komu allir prinsarnir at Jeremiah, og spurdu hann: og hann segði teimum samsvarandi við øll hesi orð sum kongur hevði áboðið. So teir lótu av at tala við hann; tí at málið varð ikki uppfatað.

28 So Jeremiah varð *verandi* í forgarðinum av fongslinum inntil tann dag ið Jerusalem varð tikið: og hann var *har* tá ið Jerusalem varð tikið.

KAPITUL 39

Í HINUM níggjunda ári Zĕd-ĕ-kī´-ăh, Judah kongs, í hinum tíggjunda mánaði, kom Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon og allur hans herur ímóti Jerusalem, og teir kringsettu hann.

2 *Og* í hinum ellivta ári Zĕd-ĕ-kī´-ăh, í hinum fjórða mánaði, hinum níggjunda *degi* mánaðarins, varð staðurin brotin upp.

3 Og allir prinsarnir hjá kongi Bábylons komu inn, og sótu í mið-portrinum, *enntá* Nĕr´-găl-sjă-rē´-zĕr, Săm´-gâr-nē´-bō, Sâr´-sĕ-chĭm, Răb´-să-rīs, Nĕr´-găl-sjă-rē´-zĕr, Rab-mag, við øllum teimum eftirverandi av prinsunum hjá kongi Bábylons.

4 ¶ Og tað bar á, *at* tá ið Zĕd-ĕ-kī´-ăh, kongur Judah, sá teir, og allar krígsmenninar, tá flýddu teir, og fóru fram út úr staðinum um nátt*ina,* eftir veginum av urtagarði kongsins, eftir portrinum ímilli múrarnar tveir: og hann fór út *eftir* vegi slættarins.

5 Men herurin hjá Chăl-dē´-unum elti eftir teimum, og innheintaði Zĕd-ĕ-kī´-ăh á slættum Jerichos: og tá ið teir høvdu tikið hann, førdu teir hann niðan til Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr-s kongs av Bábylon til Rĭb´-lăh í landi Há´-măth-s, har hann gav dóm uppá hann.

6 Tá vá kongurin av Bábylon synirnar hjá Zĕd-ĕ-kī´-ăh í Rĭb´-lăh frammi fyri eygum hans: eisini vá kongurin av Bábylon allar tignarmenninar av Judah.

7 Harafturat koyrdi hann út eyguni hjá Zĕd-ĕ-kī´-ăh, og bant hann við ketum, at bera hann til Bábylon.

8 ¶ Og Chăl-dē´-arnir brendu kongshúsið, og húsini hjá fólkinum, við eldi, og brutu niður múrarnar av Jerusalem.

9 Tá bar Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, burtur *til* fanga inn í Bábylon leivdina av fólkinum sum var eftir í staðinum, og teir sum fullu frá, sum fullu til hansara, við restini av fólkinum sum var eftir.

10 Men Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, eftirlæt av teimum fátøku av fólkinum, sum einkið høvdu, í landi Judah, og gav teimum víngarðar og akrar á hini somu tíð.

11 ¶ Nú, Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon gav álegging viðvíkjandi Jeremiah til Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn-s, høvuðsmans lívverjunnar, sigandi,

12 Tak hann, og síggj væl til hansara, og ger honum einkið mein; men ger honum enntá sum hann skal siga við teg.

13 So Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, sendi, og Nĕ-bŭ-sjăs´-băn, Răb´-să-rīs, og Nĕr´-găl-sjă-rē´-zĕr, Rab-mag, og allir prinsarnir hjá kongi Bábylons;

14 Enntá teir sendu, og tóku Jeremiah út úr forgarðinum av fongslinum, og litu hann *yvir* at Gĕ-dăl´-jăh Á´-hī-kăm-s syni Sjá-phăn-s syni, at hann skuldi føra hann heim: so hann dvaldist millum fólksins.

15 ¶ Nú, orð HARRANS kom at Jeremiah, meðan hann var innilokaður inni í forgarðinum av fongslinum, sigandi,

16 Far og tala til Ē′-bĕd-mē′-lĕch-s Ê-thĭ-ŏ′-pĭ-ara, sigandi, Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil føra míni orð omanyvir henda stað til ilt, og ikki til gott; og tey skulu verða *fullførd* á tí degi frammi fyri tær.

17 Men eg vil bjarga tær á tí degi, sigur HARRIN: og tú skalt ikki verða givin inn í hondina á monnunum, fyri hvørjum tú *ert* ræddur.

18 Tí at eg vil vissuliga útfría teg, og tú skalt ikki falla við svørðinum, men títt lív skal vera til ein fong hjá tær: av tí at tú hevurt sett títt álit á meg, sigur HARRIN.

KAPITUL 40

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah frá HARRANUM, eftir at Nĕbŭ-zâr′-ăd′-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, hevði latið hann farið frá Rá′-măh, tá ið hann hevði tikið hann, verandi bundin í ketum, millum alra sum vórðu bornir burt *til* fanga av Jerusalem og Judah, sum vórðu bornir burt *til* fanga at Bábylon.

2 Og høvuðsmaðurin av lívverjuni tók Jeremiah, og segði við hann, HARRIN tín Guð hevur lýst hetta illa omanyvir hetta pláss.

3 Nú hevur HARRIN ført *tað*, og gjørt samsvarandi sum hann hevur sagt: av tí at tit hava syndað ímóti HARRANUM, og hava ikki aktað hans rødd, tí er hetta tingið komin uppá tykkum.

4 Og nú, sí, eg loysi teg henda dag frá ketunum sum *vóru* uppiá tíni hond. Um tað tyki gott at tær at koma við mær inn í Bábylon, kom; og eg vil síggja væl til tín: men um tað tyki ilt at tær at koma við mær inn í Bábylon, lat vera: sí, alt landið *er* frammi fyri tær: hvagar tað tykir gott og hóskiligt hjá tær at fara, hagar far.

5 Nú, meðan hann ikki enn var farin tilbakar, *segði hann*, Far tilbakar eisini til Gĕ-dăl′-jăh Á′-hĭ-kăm-s sonar Sjá′-phăn-s sonar, hvønn kongurin av Bábylon hevur gjørt *til* landsstjóra yvir staðunum av Judah, og búgv hjá honum millum fólksins: ella far hvarsumhelst tað tykir hóskiligt hjá tær at fara. So høvuðsmaðurin av lívverjuni gav honum vistir og eitt endurgjald, og læt hann fara.

6 Tá fór Jeremiah at Gĕ-dăl′-jăh Á′-hĭ-kăm-s syni til Mizpah; og búði hjá honum millum fólksins sum vóru eftir í landinum.

7 ¶ Nú, tá ið allir høvuðsmenninir av *her*styrkjunum sum *vóru* í akrunum, *enntá* teir og teirra menn, hoyrdu, at kongurin av Bábylon hevði gjørt Gĕ-dăl′-jăh Á′-hĭ-kăm-s son *til* landsstjóra í landinum, og hevði litið honum *upp í hendur* menn, og kvinnur, og børn, og av teimum fátøku landsins, av teimum ið ikki vórðu borin burt *til* fanga til Bábylon;

8 Tá komu teir til Gĕ-dăl′-jăh til Mizpah, enntá Ísj′-mâ-ĕl Nĕthăn′-jăh sonur, og Jó′-hâ-năn og Jónathan Ká′-rê-ăh synir, og Sĕrâĭ′-ăh Tăn-hū′-mĕth-s sonur, og synir Ē′-phâĭ-s Nē-tôph-â-thĭt′-a, og Jĕz-ăn′-jăh, sonurin hjá einum Mă-ăch-â-thĭt′-a, teir og teirra menn.

9 Og Gĕ-dăl′-jăh Á′-hĭ-kăm-s sonur Sjá′-phăn-s sonar svór at teimum og fyri teirra monnum, sigandi, Óttist ikki at tæna Chăl-dē′-unum: búgvið í landinum, og tænið kongi Bábylons, og tað skal vera væl *statt* hjá tykkum.

10 Hvat viðvíkur mær, sí, eg vil búgva í Mizpah til at tæna Chăl-dē′-unum, sum vilja koma at okkum: men tit, savnið tit vín, og

summarfruktir, og olju, og setið *tey* í tykkara íløt, og búgvið í tykkara staðum sum tit hava tikið.

11 Líkaleiðis tá ið allir Jødarnir sum *vóru* í Móab, og Ammonitanna millum, og í Ē´-dóm, og sum *vóru* í øllum londunum, hoyrdu, at kongurin av Bábylon hevði eftirlatið eina leivd av Judah, og at hann hevði sett yvir teimum Gĕ-dăl´-jăh Á´-hĭ-kăm-s son Sjá´-phăn-s sonar;

12 Vendu enntá allir Jødarnir aftur út úr øllum plássum, hvagar teir vóru riknir, og komu til Judah lands, til Gĕ-dăl´-jăh, at Mizpah, og savnaðu vín og summarfruktir sera nógv.

13 ¶ Harafturat komu Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh sonur, og allir høvuðsmenninir av *her*styrkjunum sum *vóru* í akrunum, til Gĕ-dăl´-jăh til Mizpah,

14 Og søgdu við hann, Veitst tú vissuliga, at Bā´-ă-lĭs, kongur Ammonitanna, hevur sent Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh son at vega teg? Men Gĕ-dăl´-jăh Á´-hĭ-kăm-s sonur trúði teimum ikki.

15 Tá talaði Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh sonur til Gĕ-dăl´-jăh í Mizpah loyniliga, sigandi, Lat meg fara, eg biði teg, og eg vil vega Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh son, og eingin maður skal vita *tað:* hví skuldi hann vigið teg, at allir Jødarnir, sum eru savnaðir til tín, skuldu verðið spjaddir, og leivdin í Judah týnst?

16 Men Gĕ-dăl´-jăh Á´-hĭ-kăm-s sonur segði við Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh son, Tú skalt ikki gera hetta tingið: tí at tú talart falsliga um Ísj´-mâ-ĕl.

KAPITUL 41

NÚ, tað bar á í tí sjeynda mánaðinum, *at* Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur Ē-lī-sjá´-mă sonar, av sáðinum kongliga, og prinsar kongsins, enntá tíggju menn við honum, komu at Gĕ-dăl´-jăh Á´-hĭ-kăm-s syni til Mizpah; og har ótu teir breyð saman í Mizpah.

2 Tá reistist Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur, og teir tíggju menninir sum vóru við honum, og slógu Gĕ-dăl´-jăh Á´-hĭ-kăm-s son Sjá´-phăn-s sonar við svørðinum, og vógu hann, hvønn kongurin av Bábylon hevði gjørt *til* landsstjóra yvir landinum.

3 Ísj´-mâ-ĕl eisini vó allar Jødarnar sum vóru við honum, *enntá* við Gĕ-dăl´-jăh, í Mizpah, og Chăl-dē´-arnar sum vórðu funnir har, *og* krígsmenninar.

4 Og tað bar á annan dagin eftir *at* hann hevði vigið Gĕ-dăl´-jăh, og eingin maður vitsti *tað,*

5 At tað komu ávísir frá Sjē´-chĕm, frá Sjī´-lôh, og frá Să-mâr´-ĭ-ŭ, *enntá* fýrsinstjúgu menn, havandi skegg síni rakaði, og klæðir síni skrødd, og havandi skorið seg, við ofrum og roykilsi í síni hond, at føra *tey* til húss HARRANS.

6 Og Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur fór fram frá Mizpah at møta teimum, grátandi alla leiðina sum hann fór: og tað bar á, sum hann møtti teimum, segði hann við teir, Komið til Gĕ-dăl´-jăh Á´-hĭ-kăm-s sonar.

7 Og tað varð *soleiðis,* tá ið teir komu inn í miðjan staðin, at Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur vá teir, *og kastaði teir* inn í miðja holuna, hann, og menninir sum *vóru* við honum.

8 Men tíggju menn funnust teirra millum sum søgdu við Ísj´-mâ-ĕl, Veg okkum ikki: tí at vit hava dýrgripir í akrinum, av hveiti, og av byggi, og av olju, og av hunangi. So hann læt vera, og vó teir ikki millum brøður teirra.

9 Nú holan, í hvørja Ísj´-mâ-ĕl hevði kastað allar teir deyðu kropparnar av monnunum sum hann hevði vigið uppá grund av Gĕ-dăl´-jăh, *var* hon sum Á´-să

kongur hevði gjørt av ótta fyri Bā-ăsj´-ă kongi av Ísrael: *og* Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur fylti hana við *teimum sum vóru* vignir.

10 Tá bar Ísj´-mâ-ĕl burtur *til* fanga alt tað eftirverandi av fólkinum sum *vóru* í Mizpah, *enntá* døtur kongsins, og alt fólkið sum varð eftir í Mizpah, hvørjar Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, hevði litið *upp* til Gĕ-dăl´-jăh Á´-hī-kăm-s sonar: og Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur bar tey burt *til* fanga, og fór avstað *fyri* at fara yvir til Amonitanna.

11 ¶ Men tá ið Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh sonur, og allir høvuðsmenninir av *her*styrkjunum sum *vóru* við honum, hoyrdu um alt tað illa sum Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur hevði gjørt,

12 Tá tóku teir allar menninar, og fóru at berjast við Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh son, og funnu hann við hini miklu vøtn sum *eru* í Gibeon.

13 Nú, tað bar á, *at* tá ið alt fólkið, sum *vóru* við Ísj´-mâ-ĕl-i, sóu Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh son, og allar høvuðsmenninar av *her*styrkjunum sum *vóru* við honum, tá vórðu teir glaðir.

14 So alt fólkið, sum Ísj´-mâ-ĕl hevði borið burt *til* fanga frá Mizpah, snúðist við og vendi aftur, og fóru at Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh syni.

15 Men Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur komst undan frá Jó´-hâ-năn-i við átta monnum, og fór til Ammonitanna.

16 Tá tók Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh sonur, og allir høvuðsmenninir av *her*styrkjunum sum *vóru* við honum, alla leivdina av fólkinum sum hann hevði endurheintað frá Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh syni, frá Mizpah, eftir *at* hann hevði vigið Gĕ-dăl´-jăh Á´-hī-kăm-s son, *enntá* mektigar krígsmenn, og kvinnurnar, og børnini, og hirðmenninar, hvørji hann hevði ført aftur frá Gibeon:

17 Og teir fóru avstað, og búðu í bústaði Chīm´-hăm-s, sum er við Beth-lehem, til at fara at innfara inn í Egyptaland,

18 Uppá grund av Chăl-dē´-unum: tí at teir vóru ræddir fyri teimum, av tí at Ísj´-mâ-ĕl Nĕ-thăn´-jăh sonur hevði vigið Gĕ-dăl´-jăh Á´-hī-kăm-s son, hvønn kongurin av Bábylon gjørdi *til* landsstjóra í landinum.

KAPITUL 42

TÁ komu nær allir høvuðsmenninir av *her*styrkjunum, og Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh sonur, og Jêz-ăn´-jăh Hó-sjāī´-ăh sonur, og alt fólkið – frá hinum minsta alt at tí miklasta,

2 Og søgdu við Jeremiah prophet, Lat, vit bøna teg, okkara forbøn verða góðtikna frammi fyri tær, og bið fyri okkum at HARRANUM Guði tínum, *enntá* fyri allari hesi leivd; (tí at vit eru eftir *bert* fáir av mongum, eins og eygu tíni skoða okkum:)

3 At HARRIN tín Guð má sýna okkum vegin, hvará vit mega ganga, og tað ting sum vit mega gera.

4 Tá segði Jeremiah prophetur við teir, Eg havi hoyrt *tykkum;* sí, eg vil biðja at HARRANUM Guði tykkara samsvarandi við orð˘ tykkara; og tað skal bera á, *at* hvatsumhelst ting *ið* HARRIN skal svara tykkum, eg vil kunngera tykkum *tað;* eg vil einkið halda aftur frá tykkum.

5 Tá søgdu teir til Jeremiah, HARRIN veri eitt satt og trúfast vitni ímillum okkum, um vit geri ikki enntá samsvarandi við øll ting, fyri hvørji HARRIN tín Guð skal senda teg til okkara.

6 Hvørt *tað veri seg* gott, ella hvørt *tað veri seg* ilt, vit vilja lýða rødd HARRANS Guðs várs, til

hvørs vit senda teg; at tað má vera væl *statt* hjá okkum, tá ið vit lýða rødd HARRANS Guðs vár.

7 ¶ Og tað bar á eftir tíggju dagar, at orð HARRANS kom at Jeremiah.

8 Tá kallaði hann Jó´hâ-nân Ká´rê-âh son, og allar høvuðsmenninar av *her*styrkjunum sum *vóru* við honum, og alt fólkið — frá hinum minsta enntá til hin miklasta,

9 Og segði við teir, Svá sigur HARRIN, Guð Ísraels, at hvørjum tit sendu meg at framseta tykkara forbøn framfyri hann;

10 Um tit vilji enn verða *verandi* í hesum landi, tá vil eg byggja tykkum, og ikki toga *tykkum* niður, og eg vil planta tykkum, og ikki slíta *tykkum* upp: tí at eg iðri meg um tað illa sum eg havi gjørt tykkum.

11 Verið ikki ræddir fyri kongi Bábylons, fyri hvørjum tit eru ræddir; verið ikki ræddir fyri honum, sigur HARRIN: tí at eg *eri* við tykkum til at frelsa tykkum, og at bjarga tykkum frá hansara hond.

12 Og eg vil sýna miskunnir at tykkum, at hann má hava miskunn uppá tykkum, og volda tykkum at venda aftur til egna lands tykkara.

13 ¶ Men um tit sigi, Vit vilja ikki búgva í hesum landi, eiheldur lýða rødd HARRANS Guðs tykkara,

14 Sigandi, Nei; men vit vilja fara inn í Egyptaland, har vit einkið kríggj skulu síggja, ella hoyra ljóðið av lúðrinum, ella hava hungur um breyð; og har vilja vit búgva:

15 Og nú tessvegna hoyrið HARRANS orð, tit leivd av Judah; Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Um tit heil*veg*is seti tykkar andlit˘ til *tess* at innfara inn í Egyptaland, og fari at útisita har;

16 Tá skal tað bera á, *at* svørðið, hvørt tit óttaðust, skal innheinta tykkum har í Egyptalandi, og hungursneyðin, fyri hvørji tit vóru ræddir, skal fylgja tætt eftir tykkum har í Egyptalandi; og har skulu tit doyggja.

17 Soleiðis skal tað vera við øllum monnunum sum settu síni andlit til *tess* at fara inn í Egyptaland at útisita har; teir skulu doyggja við^ svørðinum, við^ hungursneyðini, og við^ drepsóttini: og eingin av teimum skal verða verandi ella komast undan frá tí illa sum eg vil føra uppá teir.

18 Tí at svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Eins og mín firtni og mín øði hevur verðið helt út uppá íbúgvarnar av Jerusalem; soleiðis skal mín øði verða helt fram uppá tykkum, tá ið tit skulu innfara inn í Egyptaland: og tit skulu verða ein illbiðjing, og ein ótan, og ein bølbøn, og ein skemd; og tit skulu sjá hetta plass ei meira.

19 ¶ HARRIN hevur sagt viðvíkjandi tykkum, O tit leivd av Judah; Farið tit ikki inn í Egyptaland: vitið vissuliga, at eg havi formanað tykkum henda dag.

20 Tí at tit kávalótust í tykkara hjørtum, tá ið tit sendu meg at HARRANUM Guði tykkara, sigandi, Bið fyri okkum at HARRANUM Guði várum; og samsvarandi øllum sum HARRIN Guð vár skal siga, soleiðis kunnger at okkum, og vit vilja gera *tað*.

21 Og *nú,* eg havi henda dag kunngjørt *tað* fyri tykkum; men tit hava ikki lýtt rødd HARRANS Guðs tykkara, ella nakað *ting,* fyri hvørt hann hevur sent meg at tykkum.

22 Nú tessvegna vitið vissuliga, at tit skulu doyggja við^ svørðinum, við^ hungursneyðini, og við^ drepsóttini, í tí plássi, hvagar tit tráa at fara *og* at útisita.

KAPITUL 43

OG tað bar á, *at* tá ið Jeremiah hevði lokið við at tala við alt fólkið øll orðini hjá HARRANUM Guði teirra, fyri hvørji HARRIN Guð teirra hevði sent hann til teirra, *enntá* øll hesi orð,

2 Tá talaðu Ă-zăr´-jăh Hó-sjâ´-ăh sonur, og Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh sonur, og allir hinir hugmóðigu menn, sigandi við Jeremiah, Tú talart falsliga: HARRIN Guð vár hevur ikki sent teg at siga, Farið ikki inn í Egyptaland at útisita har:

3 Men Bár´-ûch Nê´-rĭ-ăh sonur koyrir undir teg ímóti okkum, fyri at flýggja okkum inn í hondina á Chăl-dē´-unum, at teir máttu taka okkum av lívi, og bera okkum burt *til* fangar inn í Bábylon.

4 So Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh sonur, og allir høvuðsmenninir av *her*styrkjunum, og alt fólkið, lýddu ikki rødd HARRANS, at búgva í landi Judah.

5 Men Jó´-hâ-năn Ká´-rê-ăh sonur, og allir høvuðsmenninir av *her*styrkjunum, tóku alla leivdina av Judah, sum vóru vendir aftur frá øllum tjóðum, hvagar teir høvdu verðið riknir, at búgva í landi Judah;

6 *Enntá* menn, og kvinnur, og børn, og døtrarnar hjá kongi, og hvønn persón sum Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, hevði eftirlatið hjá Gĕ-dăl´-jăh Á-hĭ-kăm-s syni Sjá´-phăn-s syni, og Jeremiah prophet, og Bár´-ûch Nē´-rĭ-ăh son.

7 So teir komu inn í Egyptaland: tí at teir lýddu ikki rødd HARRANS: soleiðis komu teir *enntá* til Tâh´-păn-hēs.

8 ¶ Tá kom orð HARRANS at Jeremiah í Tâh´-păn-hēs, sigandi,

9 Tak miklar steinar í tína hond, og fjal teir í leirinum í tigulsteinsovninum, sum *er* við inngongdina av Pharaohs húsi í Tâh´-păn-hēs, í eygsjónini á monnum Judah;

10 Og sig við teir, Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil senda og taka Nĕ-bŭ-chăd-rĕz´-zâr, kong Bábylons, tænara mín, og vil seta hans hásæti uppá hesar steinar sum eg havi fjalt; og hann skal breiða sína kongligu tjaldbúð yvir teir.

11 Og tá ið hann kemur, skal hann slá Egyptaland, *og flýggja* slíkar, *sum eru* til deyða, til deyða; og slíkar, *sum eru* til fangaskap, til fangaskap; og slíkar, *sum eru* til svørðið, til svørðið.

12 Og eg vil kynda ein eld í húsunum hjá gudum Egyptalands; og hann skal brenna teir, og bera teir burt *til* fangar: og hann skal uppskrýða seg sjálvan við Egyptalandi, eins og ein hirði letur *seg* í klæði sítt; og hann skal fara fram haðani frá í friði.

13 Hann skal bróta eisini myndir Bĕth´-sjê-mĕsj, sum *er* í Egyptalandi; og húsini hjá gudum Egyptanna skal hann brenna við eldi.

KAPITUL 44

ORÐIÐ, sum kom til Jeremiah viðvíkjandi øllum Jødunum sum búgva í Egyptalandi, sum búgva í Mĭg´-dōl, og í Tâh´-păn-hēs, og í Nōph, og í landi Păth´-rōs-ar, sigandi,

2 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Tit hava sæð alt tað illa sum eg havi ført uppá Jerusalem, og uppá allar staðirnar av Judah; og sí, henda dag *eru* teir ein oyðing, og eingin maður býr harí,

3 Uppá grund av teirra vondsku sum teir hava framt til at tirra meg til firtnis, í at teir fóru til *tess* at brenna roykilsi, *og* at tæna øðrum gudum, hvørjar teir kendu ikki, *hvørki* teir, tit, ella fedrar tykkara.

4 Hvussu enn er, eg sendi at tykkum allar mínar tænarar prophetarnar, rísandi árla og sendandi *teir,* sigandi, Á, gerið ikki hetta andstyggiliga ting sum eg hati.

5 Men teir lurtaðu ikki, ella boygdu sítt oyra til *tess* at venda frá síni vondsku, einkið roykilsi at brenna at øðrum gudum.

6 Hvørsvegna mín øði og mín firtni varð helt fram, og varð kynd í staðunum av Judah og í gøtum Jerusalems; og tey eru oydd *og* oyðin, sum á hesum degi.

7 Tessvegna nú, svá sigur HARRIN, Guð herliðanna, Guð Ísraels; Hvørsvegna fremja tit *hetta* mikla illa ímóti tykkara sálum, at skera av frá tykkum mann og kvinnu, barn og bróstabarn, út úr Judah, at eftirlata tykkum ongan til at verða verandi;

8 Í at tit tirra meg at vreiði við verkum handa tykkara, brennandi roykilsi at øðrum gudum í Egyptalandi, hvagar tit veri farnir at búgva, at tit máttu skera tykkum sjálvar av, og at tit máttu vera ein banning og ein skemd millum alra tjóða jarðarinnar?

9 Hava tit gloymt vondskuna hjá tykkara fedrum, og vondskuna hjá kongunum av Judah, og vondskuna hjá teirra konum, og tykkara egnu vondsku, og vondskuna hjá tykkara konum, sum tey hava framt í landi Judah, og í gøtunum av Jerusalem?

10 Tey eru ikki eyðmjúkgjørd *alt* at hesum degi, eiheldur hava tey óttast, ella gingið í míni lóg, ella í mínum ásetingum, sum eg setti framfyri tykkum og framfyri tykkara fedrar.

11 ¶ Tessvegna, svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil seta mítt andlit ímóti tykkum til ilt, og til at skera av alt Judah.

12 Og eg vil taka leivdina av Judah, sum hava sett síni andlit til *tess* at fara inn í Egyptaland at útisita har, og teir skulu allir verða upptærdir, *og* falla í Egyptalandi; teir skulu *enntá* verða upptærdir við svørðinum *og* við hungursneyðini: teir skulu doyggja, frá hinum minsta alt at tí miklasta, við svørðinum og við hungursneyðini: og teir skulu verða ein illbiðjing, *og* ein øtan, og ein bølbøn, og ein skemd.

13 Tí at eg vil revsa teir sum búgva í Egyptalandi, eins og eg havi revsað Jerusalem, við svørðinum, við hungursneyðini, og við drepsóttini:

14 So at eingin av leivdini av Judah, sum eru farnir inn í Egyptaland at útisita har, skal komast undan, ella verða verandi, at teir skuldu vent aftur inn í land Judah, til hvørs teir hava eina tráan at venda aftur at búgva har: tí at eingin skal venda aftur, uttan slíkir sum skulu komast undan.

15 ¶ Tá svaraðu allir menninir sum vitstu at teirra konur høvdu brent roykilsi at øðrum gudum, og allar kvinnurnar sum stóðu hjá, ein mikil fjøld, enntá alt fólkið sum búði í Egyptalandi, í Păth′-rŏs, Jeremiah, sigandi,

16 *Hvat viðvíkur* orðinum sum tú hevurt talað við okkum í navni HARRANS, vit vilja ikki lýða á teg.

17 Men vit vilja vissuliga gera hvatsumhelst ting *ið* gongur fram út úr egna munni okkara, at brenna roykilsi at himinsdrotningini, og at hella út drykkoffur at henni, eins og vit hava gjørt, vit, og okkara fedrar, okkara kongar, og okkara prinsar, í staðunum av Judah, og í gøtum Jerusalems: tí at *tá* høvdu vit ríviligt av vistum, og vóru væl *stødd,* og sóu einkið ilt.

18 Men síðan vit lótu av at

brenna roykilsi til himinsdrotningina, og at hella út drykkoffurˇ at henni, hevur okkum vantað øll *ting,* og hava verðið upptærdir viðˆ svørðinum og viðˆ hungursneyðini.

19 Og tá ið vit brendu roykilsi til himinsdrotningina, og heltu út drykkoffurˇat henni, gjørdu vit henni køkur til at tilbiðja hana, og heltu út drykkoffurˇ at henni, uttan okkara menn?

20 ¶ Tá segði Jeremiah við alt fólkið, til menninar, og til kvinnurnar, og til alt fólkið sum høvdu givið honum *tað* svarið, sigandi,

21 Roykilsið, sum tit brendu í staðunum av Judah, og í gøtum Jerusalems, tit, og tykkara fedrar, tykkara kongar, og tykkara prinsar, og fólk landsins, mintist ikki HARRIN til teirra, og kom tað *ikki* inn í huga hansara?

22 So at HARRIN kundi ikki longur bera *tað,* uppá grund av tí illa av tykkara gerðum, *og* uppá grund av andstygdunum sum tit hava framt; tí er tykkara land ein oyðing, og ein ætan, og ein bølbøn, uttan íbúgva, sum á hesum degi.

23 Av tí at tit hava brent roykilsi, og av tí at tit hava syndað ímóti HARRANUM, og hava ikki lýtt rødd HARRANS, ella gingið í lóg hansara, ella í ásetingum hansara, ella í hansara vitnisburðum; tí er hetta illa hent tykkum, sum á hesum degi.

24 Harafturat segði Jeremiah við alt fólkið, og til allar kvinnurnar, Hoyrið HARRANS orð, alt Judah sum *eru* í Egyptalandi:

25 Svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels, sigandi; Tit og tykkara konur hava bæði talað við tykkara munnum, og uppfylt við tykkara hond, sigandi, Vit vilja vissuliga útinna okkara heitstreingir sum vit hava strongt, at brenna roykilsi til himinsdrotningina, og at hella út drykkoffurˇ at henni: tit vilja vissuliga fullføra tykkara heitstreingir, og vissuliga útinna tykkara heitstreingir.

26 Tessvegna, hoyrið tit orð HARRANS, alt Judah sum búgva í Egyptalandi; Sí, eg havi svorið við mikla navn mítt, sigur HARRIN, at mítt navn skal ei meira verða nevnt í munninum á nøkrum manni av Judah í øllum Egyptalandi, sigandi, Harrin GUÐ livir.

27 Sí, eg vil vaka yvir teimum til ilt, og ikki til gott: og allir menninir av Judah, sum *eru* í Egyptalandi, skulu verða upptærdir við svørðinum og við hungursneyðini, inntil tað verði ein endi á teimum.

28 Tó skal eitt lítið tal, sum kemst undan svørðinum, venda aftur út úr Egyptalandi inn í land Judah, og øll leivdin av Judah, sum eru farnir inn í Egyptaland at útisita har, skulu vita hvørs orð skulu standa, míni, ella teirra.

29 ¶ Og hetta *skal vera* eitt tekin at tykkum, sigur HARRIN, at eg vil revsa tykkum í hesum plássi, at tit mega vita, at orð míni skulu vissuliga standa ímóti tykkum til ilt:

30 Svá sigur HARRIN; Sí, eg vil geva Phâr´-ă-ōh-hŏph´-ră kong av Egyptalandi inn í hondina á hansara fíggindum, og inn í hondina á teimum sum søkja hansara lív; eins og eg gav Zĕd-ĕ-kī´-ăh kong av Judah inn í hondina á Nĕ-bū-chăd-rēz´-zâr kongi av Bábylon, hansara fíggindum, og sum søkti hansara lív.

KAPITUL 45

ORÐIÐ, sum Jeremiah prophetur talaði við Bár´-ūch Nē´-rī-ăh son, tá ið hann hevði skrivað hesi orð í eina bók við

munn Jeremiah, í hinum fjórða
ári Jĕ-hŏĭ´-ă-kĭm-s Jŏ´-sī-ăh sonar,
Judah kongs, sigandi,
2 Svá sigur HARRIN, Guð Ísra-
els, við teg, O Bár´-ūch;
3 Tú segðirt, Eya meg nú! tí at
HARRIN hevur lagt harm afturat
míni sorg; eg ørmaktaðist í míni
suffan, og eg finni onga hvílu.
4 ¶ Svá skalt tú siga við hann,
HARRIN sigur svá; Sí, *tað* sum eg
havi bygt, vil eg bróta niður, og
tað sum eg havi plantað, vil eg
slíta upp, enntá alt hetta land.
5 Og sókirt tú mikil ting til tín
sjálvs? søk *tey* ikki: tí at sí, eg vil
føra ilt omanyvir alt kjøt, sigur
HARRIN: men títt lív vil eg geva
tær til ein fong í øllum plássum,
hvagar tú fert.

KAPITUL 46

ORÐ HARRANS, sum kom til
Jeremiah prophets ímóti
Heidningunum;
2 Ímóti Egyptalandi, ímóti her-
inum hjá Phâr´-ă-ōh-nĕ´-chō kongi
av Egyptalandi, sum var við ánna
Ĕv-phrā´-tēs í Câr´-chĕ-mĭsj, sum
Nĕ-bū-chăd-rēz´-zâr kongur av Bá-
bylon sló í hinum fjórða ári Jĕ-
hŏĭ´-ă-kĭm-s Jŏ´-sī-ăh sonar, Judah
kongs.
3 Orðnið tit smáskjøldurin og
skjøldurin, og nærkist til orrustu.
4 Brynjið hestarnar; og komið
upp, tit hestmenn, og standið
fram við hjálmum *tykkara;* blank-
ið spjótini, *og* farið í ringbrynjur-
nar.
5 Hví havi eg sæð teir mót-
falnar *og* vendar burt tilbakar?
og hinir mektigu av teimum eru
bardir niður, og eru flýddir fljótt,
og hugdu ikki tilbakar: *tí at* ótti
var runt umkring, sigur HARRIN.
6 Lat ikki hin fljóta flýggja
burt, ella hin mektiga mann kom-
ast undan; teir skulu snáva, og
falla ímóti norðuri við ánna Ĕv-
phrā´-tēs.
7 Hvør *er* hesin *ið* kemur upp
sum ein flóð, hvørs vøtn verða
rørd eins og løkirnir?
8 Egyptaland rísur upp sum
ein flóð, og *hansara* vøtn verða
rørd sum løkirnir; og hann sigur,
eg vil fara upp, *og* vil hylja jørð-
ina; eg vil oyða staðin og íbúgvar
hans.
9 Komið upp, tit hestar; og
leikið í, tit vagnar; og lat hinar
mektigu menn koma fram; Ē-
thĭ-ō´-pĭ-ararnar og Lĭ´-bў-arar-
nar, sum handfara skjøldurin; og
Lý´-dĭ-ararnar, sum handfara *og*
spenna bogan.
10 Tí at hetta *er* dagur Harrans
GUÐS herliðanna, ein hevndar-
dagur, at hann má hevna seg
á sínar mótstandarar: og svørðið
skal uppgloypa, og tað skal verða
stappmett og gjørt drukkið við
teirra blóði: tí at Harrin GUÐ
herliðanna hevur eitt sláturoffur
í norður landinum við ánna Ĕv-
phrā´-tēs.
11 Far niðan í Gilead, og tak
balsam, O jomfrú, Egyptalands
dóttir: til fánýtis skalt tú brúka
nógvar heilivágir; *tí at* tú skalt
ikki verða lekt.
12 Tjóðirnar hava hoyrt um
skomm tína, og títt geyl hev-
ur fylt landið: tí at hin mektigi
maður hevur snávað ímóti tí
mektiga, *og* teir eru falnir báðir
tilsaman.
13 ¶ Orðið, sum HARRIN talaði
til Jeremiah prophets, hvussu Nĕ-
bū-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábу-
lon skuldi koma *og* sláa Egypta-
land.
14 Lýsið tit í Egyptalandi, og
kunngerið í Mĭg´-dŏl, og kunnger-
ið í Nŏph og í Tâh´-păn-hēs: sigið
tit, Statt fastur, og fyribúgv teg;
tí at svørðið skal uppgloypa rund-
an um teg.
15 Hví eru tínir reystir *menn*
sópaðir burt? teir stóðu ikki, av
tí at HARRIN rak teir.

16 Hann fekk mangar at falla, ja, ēin fell omanyvir annan: og teir søgdu, Reis *teg*, og latum okkum fara aftur til okkara egna fólk, og til upprunaland okkara, frá tí kúgandi svørðinum.

17 Teir geylaðu har, Pharaoh kongur av Egyptalandi *er bert* eitt ljóð; hann er farin framvið hini ásettu tíð.

18 *Sum* eg livi, sigur Kongurin, hvørs navn *er* HARRI herliðanna, Vissuliga, sum Tā́-bôr *er* fjallanna millum, og sum Carmel *er* við sjógvin, *so* skal hann koma.

19 O tú dóttir, búgvandi í Egyptalandi, ger út teg sjálva at fara inn í fangaskap: tí at Nōph skal verða oyði og avtoftað uttan íbúgva.

20 Egyptaland *er eins og* ein sera vøkur kvíga, *men* oyðing kemur; hon kemur úr norðan.

21 Eisini hennara leigaðu menn *eru* í miðjari henni sum gøddir ungtarvar; tí at teir eisini eru vendir tilbakar, *og* eru flýddir burt tilsaman: teir stóðu ikki, av tí at dagurin av teirra skaðatilburði var komin omanyvir teir, *og* tíðin av teirra heimsøking.

22 Røddin hará skal fara líka *sum* ein høggormur; tí at teir skulu herganga við einum heri, og koma ímóti henni við øksum, sum høggarar av viði.

23 Teir skulu skera niður skóg hennara, sigur HARRIN, hóast hann kann ei verða kannaður; av tí at teir eru fleiri enn grashoppurnar, og *eru* óteljiligir.

24 Egyptalands dóttir skal verða fjamskað; hon skal verða flýggjað inn í hondina á fólki norðursins.

25 HARRI herliðanna, Guð Ísraels, sigur; Sí, eg vil revsa fjøldina úr Nō, og Pharaoh, og Egyptaland, við gudum teirra, og kongum teirra; enntá Pharaoh, og *allar* teir sum líta á hann:

26 Og eg vil flýggja teir inn í hondina á teimum ið søkja teirra lívˇ, og inn í hondina á Nĕ-bŭchăd-rēz´-zâr kongi av Bábylon, og inn í hondina á hansara tænarum: og síðani skal tað verða bygt, sum í døgunum í forðum, sigur HARRIN.

27 ¶ Men óttast ikki tú, O tænari mín Jákob, og ver ikki mótfallin, O Ísrael: tí at sí, eg vil frelsa teg langt burturifrá, og títt sáð frá landinum av teirra fangaskapi; og Jákob skal venda aftur, og vera í hvíld og við ró, og eingin skal gera *hann* ræddan.

28 Óttast tú ikki, O Jákob, tænari mín, sigur HARRIN: tí at eg *eri* við tær; tí at eg vil gera ein fullan enda á øllum teim tjóðum, hvagar eg havi rikið teg: men eg vil ikki gera ein fullan enda á tær, men rættleiða teg í máti; tó vil eg ikki eftirlata teg heil*veg*is órevsaðan.

KAPITUL 47

ORÐ HARRANS, sum kom til Jeremiah prophets, ímóti Philistunum, áðrenn ið Pharaoh sló Gā́-zā.

2 Svá sigur HARRIN; Sí, vøtn rísa upp út úr norðuri, og skulu verða ein yvirfløðandi flóð, og skulu yvirfløða landið, og alt sum er harí; staðin, og teir sum búgva harí: tá skulu menninir geyla, og allir íbúgvar landsins skulu ýla.

3 Við ljóðið av trampingini av hógvunum av hansara sterku *hestum*, við stormingina av hansara vagnum, *og við* rumblingina av hansara hjólum, skulu fedrarnir ikki hyggja tilbakar til barna *sína* fyri máttloysi av hondum;

4 Uppá grund av deginum sum kemur til at ræna allar Philistarnar, *og* at skera av frá Týˊ-rūs og Zīˊ-dŏn hvønn hjálpara sum er verandi: tí at HARRIN vil ræna Philistarnar, leivdina av landi Căphˊ-tôr-s.

5 Skallutsemi er komin uppá Gā´-zā; Ăsj´-kĕ-lŏn er skorin av *við* leivdini av teirra dali: hvussu leingi vilt tú skera teg sjálva?

6 O tú svørð HARRANS, hvør leingi *vil tað vera*, áður *enn* tú verði kvirt? set upp teg sjálvt inn í slíðra tín, hvíl, og ver stilt.

7 Hvussu kann tað vera kvirt, eftirsum *at* HARRIN hevur givið tí eina álegging ímóti Ăsj´-kĕ-lŏn, og ímóti sævarstrondini? har hevur hann útnevnt tað.

KAPITUL 48

ÍMÓTI Móab, svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Vei Nē´-bō! tí at tað er rænt: Kĭr-já-thá´-ĭm er fjamskað *og* tikið: Mĭs´-găb er fjamskað og mótfallið.

2 Eingin meira prís*an skal vera* av Móab: í Hĕsj´-bŏn hava teir upphugsað ilt ímóti tí; komið, og latum okkum skera tað av frá *at vera* ein tjóð. Eisini tú skalt verða skorin niður, O Măd´-mĕn; svørðið skal elta teg.

3 Ein rødd av geyling *skal verða* frá Hór-ô-nā´-ĭm, ræning og mikil oyðing.

4 Móab er oytt; hini smáu hennara hava volt einum geyli at verða hoyrdum.

5 Tí at í niðanfaring Lū´-hĭth-s skal áframhaldandi gráting fara upp; tí at í omanfaringini av Hór-ô-nā´-ĭm hava figgindarnir hoyrt eitt oyðingargeyl.

6 Flýggið, bjargið lívum tykkara, og verið líka *sum* lyngurin í oyðuni.

7 ¶ Tí at av tí at tú hevurt litið á tíni verk og á tínar dýrgripir, skalt tú eisini verða tikin: og Chē´-mōsj skal fara fram inn í fangaskap *við* sínum prestum og sínum prinsum tilsaman.

8 Og rænarin skal koma omanyvir hvønn stað, og eingin staður skal komast undan: dalurin eisini skal týnast, og slættin skal verða oyddur, eins og HARRIN hevur talað.

9 Gevið veingir at Móab, at tað má flýggja og komast burt: tí at staðir tess skulu verða oydnir, uttan nakran at búgva hari.

10 Bannaður *veri* hann, sum ger verk HARRANS sviksamliga; og bannaður *veri* hann, ið heldur tilbakar sítt svørð frá blóði.

11 ¶ Móab hevur verið við ró frá sínum ungdómi, og hann hevur lagst á berskakar sínar, og hevur ei verðið tømdur frá keri til kers, eiheldur hevur hann farið inn í fangaskap: tí varð hansara smakkur verandi í honum, og hansara luktur er ikki broyttur.

12 Tessvegna, sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, sum eg vil senda at honum flakkarar, sum skulu elva honum at flakka, og skulu tøma kerini hjá honum, og bróta fløskurnar hjá teimum.

13 Og Móab skal skammast um Chē´-mōsj, eins og Ísraels hús skammaðist um Beth-el sítt troyst.

14 ¶ Hvussu siga tit, Vit *eru* mektigir og sterkir menn til kríggið?

15 Móab er rændur, og farin upp *út úr* staðum sínum, og hans útvaldu ungu menn eru farnir oman til slátringina, sigur Kongurin, hvørs navn *er* HARRI herliðanna.

16 Skaðatilburður Móabs *er* nær *við* at koma, og hansara kvøljan skundar skjótt *til*.

17 Allir tit, sum eru rundan um hann, harmið hann; og allir tit, sum kenna hans navn, sigið, Hvør er hin sterki stavur brotin, *og* hin fagri sproti!

18 Tú dóttir, sum býrt í Dī´-bŏn, kom niður frá *tíni* dýrd, og sit í torsta; tí at rænarin av Móab skal koma uppá teg, *og* hann skal oyðileggja tíni vígvirkir.

19 O íbúgvi av Á´-rō-ĕr, statt við vegin, og slota; spyr hann sum

flýggjar, og hana sum kemst undan, *og* sig, Hvat hevur gjørst?
20 Móab er fjamskað; tí at tað er brotið niður: ýlið og geylið; sigið tit frá tí í Arnon, at Móab er rænt,
21 Og dómur er komin omanyvir slættlendið; omanyvir Hólon, og omanyvir Jahá-zah, og omanyvir Mephá-ath,
22 Og omanyvir Dí-bon, og omanyvir Ne-bo, og omanyvir Beth-díb-la-thá-im,
23 Og omanyvir Kir-já-thá-im, og omanyvir Beth-gám-úl, og omanyvir Beth-me-ón,
24 Og omanyvir Ker-í-oth, og omanyvir Boz-rah, og omanyvir allar staðir Móabs lands, fjar ella nær.
25 Móabs horn er skorið av, og hans armur er brotin, sigur HARRIN.
26 ¶ Gerið tit hann druknan: tí at hann gjørdi *seg* stóran ímóti HARRANUM: Móab eisini skal velta *sær* í síni spýggju, og hann eisini skal vera í speireking.
27 Tí at var ikki Ísrael ein speireking at tær? varð hann funnin millum tjóva? tí at síðan tú talaðirt um hann, leypst tú av frøi.
28 O tit sum dvøljast í Móab, eftirlatið staðirnar, og dvøljist í klettinum, og verið sum dúgvan *sum* ger sítt reiður í síðunum av hols-munnanum.
29 Vit hava hoyrt hugmóðina hjá Móab, (hann er ovurhonds hugmóðigur), hans hálæti, og hans dramblæti, og hástórni hjarta hans.
30 Eg kenni hansara vreiði, sigur HARRIN; men *tað skal* ikki *verða* so; hansara lygnir skulu ikki soleiðis ávirka *tað*.
31 Tí vil eg ýla um Móab, og eg vil geyla út um alt Móab; *mítt hjarta* skal harma um menninar av Kir-he-rés.
32 O Síb-mah-s víntræ, eg vil gráta yvir teg við gráting Já-zer-s: tínar plantur eru farnar yvirum sjógvin, tær røkka *enntá* til havs Já-zer-s: rænarin er fallin uppá tínar summar fruktir og uppá tín vínskurð.
33 Og frøi og gleði er tikin frá tí ríkiliga akrinum, og frá landi Móabs; og eg havi volt víni at dvína frá vínfargunum: eingin skal treða við rópan; *teirra* rópan *skal* eingin rópan *vera*.
34 Frá Hesj-bon-s geyli *alt* at El-e-á-lêh, *og alt* at Já-haz, hava teir mælt síni rødd, frá Zó-ar *alt* at Hór-ô-ná-im, *sum* ein trý ára gomul kvíga: tí at vøtnini eisini hjá Nimrim skulu verða oyðin.
35 Harafturat vil eg volda at halda uppat í Móab, sigur HARRIN, hann sum ofrar í hinum høgu plássum, og hann sum brennur roykilsi til guda sína.
36 Tí skal mítt hjarta ljóða yvir Móab líka *sum* pípur, og mítt hjarta skal ljóða líka *sum* pípur yvir menninar av Kir-he-rés: av tí at ríkidømini, *sum* hann hevur skaffað, eru týnd.
37 Tí at hvørt høvd *skal verða* skallut, og hvørt skegg klipt: uppiá øllum hondunum *skulu verða* skeringar, og uppiá lendunum sekkjaklæði.
38 *Har skal verða* harman sum heild uppiá øllum húsatoppum Móabs, og í gøtum tess: tí at eg havi brotið Móab líka *sum* eitt ker, hvarí eingin fragd *er,* sigur HARRIN.
39 Teir skulu ýla, *sigandi,* Hvør er tað brotið niður! hvør hevur Móab vent ryggin við skomm! soleiðis skal Móab verða ein speireking og ein mótfalling fyri øllum teimum umkring hann.
40 Tí at svá sigur HARRIN; Sí, hann skal flúgva sum ein ørn, og skal breiða sínar veingir yvir Móab.
41 Ker-í-oth er tikin, og vígvirkini eru ovfarin, og hjørtuni hjá teimum mektigu monnunum í

Móab á tí degi skulu vera eins og hjartað hjá eini kvinnu í sínum verkjum.

42 Og Móab skal verða oyddur frá *at vera* eitt fólk, av tí at hann hevur gjørt *seg* stóran ímóti HARRANUM.

43 Ótti, og holan, og snerran, *skulu vera* uppiá tær, O íbúgvi av Móab, sigur HARRIN.

44 Hann, sum flýggjar frá óttanum, skal falla inn í holuna; og hann, sum kemst upp út úr holuni, skal verða tikin í snerruni: tí at eg vil føra uppá tað, *enntá* uppá Móab, árið av teirra heimsøking, sigur HARRIN.

45 Teir, sum flýddu, stóðu undir skugganum av Hesj´-bön uppá grund av kraftini: men ein eldur skal koma fram út úr Hesj´-bön, og ein flamma frá miðjum Sī´-hön, og skal upptæra hjørnið á Móab, og krúnu høvurs hinna ófriðarlátigu.

46 Vei veri tær, O Móab! fólkið av Chē´-mösj týnist: tí at tínir synir eru tiknir *til* fangar, og tínar døtur fangar.

47 ¶ Tó vil eg føra aftur fangaskapin av Móab í teimum seinnu døgunum, sigur HARRIN. So langt *er* dómur Móabs.

KAPITUL 49

VIÐVÍKJANDI Ammonitunum, svá sigur HARRIN; Hevur Ísrael ongar synir? hevur hann ongan arvinga? hví arvar teirra kongur *tá* Gád, og *hví* býr hansara fólk í hansara staðum?

2 Tessvegna, sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at eg vil volda einum krígs-herrópi at verða hoyrdum í Räb´-bäh Ammonitanna; og tað skal verða ein oyðin rúgva, og hennara døtur skulu verða brendar við eldi: tá skal Ísrael vera arvingi at teimum sum vóru arvingar hans, sigur HARRIN.

3 Ýl, O Hesj´-bön, tí at Ā´-ī er rænt: geylið, tit Räb´-bäh døtur, gyrðið tykkum við sekkjaklæði; harmið, og rennið til og frá við girðingarnar; tí at teirra kongur skal fara inn í fangaskap, *og* hansara prestar og hansara prinsar tilsaman.

4 Hví dýrdarst tú í dølunum, tínum fløðandi dali, O fráfallandi dóttir? sum troystaði á sínar dýrgripir, *sigandi,* Hvør skal koma at mær?

5 Sí, eg vil føra ein ótta uppá teg, sigur HARRIN GUÐ herliðanna, frá øllum teimum ið veri *seg* um teg; og tit skulu verða riknir út hvør maður beint fram; og eingin skal savna upp hann sum reikar.

6 Og síðani vil eg føra aftur fangaskapin av Ammons børnum, sigur HARRIN.

7 ¶ Viðvíkjandi Ē´-dóm, svá sigur HARRI herliðanna; *Er* vísdómur ikki meira í Tē´-män? er ráð týnt frá teimum hygnu? er teirra vísdómur horvin?

8 Flýggið tit, vendið tilbakar, búgvið djúpt, O íbúgvar av Dē´-dän; tí at eg vil føra skaðatilburð Esavs uppá hann, ta tíð *sum* eg vil heimsøkja hann.

9 Um vínberjahentarar komi til tín, vildu teir ikki eftirlatið *nøkur* finhentingar-vínber? um tjóvar um nátt*ina,* teir vilja oyða til teir hava nokk.

10 Men eg havi gjørt Esav beran eg havi avdekkað hansara loyniligu stød, og hann skal ei vera førur fyri at fjala seg: sáð hans er herjað, og hansara brøður, og hansara grannar, og hann *er* ikki.

11 Eftirlat tíni faðirleysu børn, eg vil varðveita *tey* á lívi; og lat tínar einkjur troysta á meg.

12 Tí at svá sigur HARRIN; Sí, teir, hvørs dómur *var* ikki at drekka av bikarinum, hava vissuliga drukkið; og *ert* tú hann *sum* skal aldeilis sleppa órevsaður? tú

skalt ikki sleppa órevsaður, men tú skalt vissuliga drekka *av tí*.

13 Tí at eg havi svorið við meg sjálvan, sigur HARRIN, at Böz´-răh skal gerast ein oyðing, ein skemd, ein toft, og ein banning; og allir staðirnir harav skulu vera viðvarandi toftir.

14 Eg havi hoyrt eitt graml frá HARRANUM, og ein umboðsmaður er sendur at teimum heidnu, *sigandi,* Savnist tit saman, og komið ímóti henni, og rísið upp til bardagan.

15 Tí at sí, eg vil gera teg lítlan millum hinna heidnu, *og* vanvirdan manna millum.

16 Tín ræðuligleiki hevur villleitt teg, *og* hugmóð hjarta tíns, O tú sum býrt í klivum klettarins, sum heldurt hædd heyggjarins: tó *at* tú skuldirt gjørt títt reiður so høgt sum ørnin, vil eg føra teg niður haðani frá, sigur HARRIN.

17 Eisini Ē´-dóm skal verða ein oyðing: hvør tann, sum fer framvið tí, skal verða ógvaður, og skal físa at øllum tess plágum.

18 Eins og í kollrenningini av Sodomu og Gō-mŏr´-rŭh og granna *staðum* tess, sigur HARRIN, skal eingin maður verða *verandi* har, eiheldur skal ein menniskjusonur búgva í tí.

19 Sí, hann skal koma upp sum ein leyva frá bólgnan Jordans ímóti bústaðinum hjá tí sterka: men eg vil brádliga fáa hann *at* renna burtur frá henni: og hvør *er* ein útvaldur *maður, sum* eg kann útnevna yvir henni? tí at hvør *er* líka *sum* eg? og hvør vil áseta mær tíðina? og hvør *er* hasin hirði, sum vil standa frammi fyri mær?

20 Tessvegna, hoyrið ráðið hjá HARRANUM, sum hann hevur lagt ímóti Ē´-dóm; og hansara ráðagerðir, sum hann hevur avrátt ímóti íbúgvum Tē´-măn-s: Vissuliga, hinir minstu av fylginum skulu hála teir út: vissuliga, hann skal gera teirra bústaðir oydnar við teimum.

21 Jørðin verður vikað við ljóðið av teirra falli, við geylið varð ljóðið harav hoyrt í Reyða-havinum.

22 Sí, hann skal koma upp og flúgva sum ørnin, og breiða sínar veingir yvir Böz´-răh: og á tí degi skal hjarta hinna mektigu manna Ē´-dóm-s vera sum hjartað hjá eini kvinnu í sínum verkjum.

23 ¶ Viðvíkjandi Damascus. Há´-măth er fjamskað, og Arpad: tí at teir hava hoyrt ill tíðindir: teir eru veikhjartaðir; sorg *er* á sjónum; hann fær ikki verið kvirrur.

24 Damascus er vorðin ússalig, *og* vendir sær til at flýggja, og ótti hevur lagst á *hana:* angist og sorgir hava tikið hana, sum eina kvinnu í verkjum.

25 Hvør er staður lovsins ikki eftirlatin, staður frøi mínar!

26 Tí skulu hennara ungu menn falla í hennara gøtum, og allir krígsmenninir skulu verða avskornir í tí degi, sigur HARRI herliðanna.

27 Og eg vil kynda ein eld í múri Damascusar, og hann skal upptæra slott˘ Běn-há´-dăd-s.

28 ¶ Viðvíkjandi Kē´-dăr, og viðvíkjandi kongadømum Hā´-zôr-s, sum Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon skal slá, svá sigur HARRIN; Reisist tit, farið niðan til Kē´-dăr, og herjið menn eystursins.

29 Teirra tjøld og teirra fylgir skulu teir taka burtur: teir skulu taka til sín sjálvs teirra tjalddúkar, og øll teirra ker, og teirra kamelar; og teir skulu geyla at teimum, Ótti *er* á hvørjari síðu.

30 ¶ Flýggið, komið tykkum langt burtur, búgvið djúpt, O tit íbúgvar av Hā´-zôr, sigur HARRIN; tí at Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon hevur hildið ráðlegging ímóti tykkum, og hevur alið fram eina ráðagerð ímóti tykkum.

31 Reisist, komið tykkum niðan

at hini múgvandi tjóð, sum býr uttan súr, sigur HARRIN, sum hava hvørki portur˘ ella lokur, *sum* búgva einsamallir.

32 Og teirra kamelar skulu verða eitt býti, og fjøldin av teirra fenaði ein fongur: og eg vil spjaða inn í allar vindar teir *sum eru* í hinum ytstu *út*hornum; og eg vil føra teirra skaðatilburð frá øllum síðum harav, sigur HARRIN.

33 Og Hā´-zôr skal vera ein bústaður til drekar, *og* ein oyðing um ævir: tað skal eingin maður verða *verandi* har, ella *nakar* menniskjusonur búgva í tí.

34 ¶ HARRANS orð, sum kom til Jeremiah prophets ímóti Ē´-lăm í byrjanini av ríkjan Zĕd-ē-kī´-ăh kongs av Judah, sigandi,

35 Svá sigur HARRI herliðanna; Sí, eg vil bróta boga Ē´-lăm-s, tað fremsta av teirra megi.

36 Og omanyvir Ē´-lăm vil eg føra hinar fýra vindar frá hinum fýra fjórðingum himins, og vil spjaða teir ímóti øllum teimum vindunum; og tað skal eingin tjóð vera, hvagar hinir útstoyttu Ē´-lăm-s skulu ikki koma.

37 Tí at eg vil elva Ē´-lăm at verða mótfallið frammi fyri sínum fíggindum, og frammi fyri teimum ið søkja teirra lív: og eg vil føra ilt uppá teir, *enntá* mína grimmu firtni, sigur HARRIN; og eg vil senda svørðið eftir teimum, til eg havi upptært teir:

38 Og eg vil seta mítt hásæti í Ē´-lăm, og vil oyða haðani kongin og prinsarnar, sigur HARRIN.

39 ¶ Men tað skal bera á í teimum seinnu døgunum, *at* eg vil føra aftur fangaskap Ē´-lăm-s, sigur HARRIN.

KAPITUL 50

ORÐIÐ, sum HARRIN talaði ímóti Bábylon *og* ímóti landi Chăl-dē´-anna, við^ Jeremiah propheti.

2 Klárleggið tit tjóðanna millum, og kunngerið, og setið upp eitt merki; kunngerið, *og* loynið ikki: sigið, Bábylon er tikin, Bel er fjamskað, Mĕr´-ô-dăch er brotin í stykkir; hennar avgudar eru fjamskaðir, hennara myndir eru brotnar í stykkir.

3 Tí at úr norðan kemur upp ein tjóð ímóti henni, sum skal gera land hennara oyði, og eingin skal búgva harí: teir skulu burtflyta, teir skulu fara avstað, bæði maður og djór.

4 ¶ Í teimum døgum, og í teirri tíð, sigur HARRIN, skulu børn Ísraels koma, teir og børn Judah tilsaman, farandi og grátandi: teir skulu fara, og søkja HARRAN Guð sín.

5 Teir skulu spyrja *um* vegin til Zion við sínum andlitum hagarmót, *sigandi*, Komið, og latum okkum sameina okkum til HARRANS í einum viðvarandi sáttmála, *sum* skal ei verða gloymdur.

6 Mítt fólk hevur verið burturvilstur seyður: teirra hirðar hava volt teimum at fara til stroks, teir hava vent teimum burtur *á* fjøllunum: teir hava farið frá fjalli til hóls, teir hava gloymt sítt hvílustað.

7 Allir, sum funnu teir, hava uppslúkað teir: og teirra mótstandarar søgdu, Vit misbrótast ikki, av tí at teir hava syndað ímóti HARRANUM, rættlætis bústaðinum, enntá HARRANUM, vón fedra sína.

8 Burtflytið út úr miðjari Bábylon, og farið fram út úr landi Chăl-dē´-anna, og verið sum havrarnir frammanfyri fylgjunum.

9 ¶ Tí at sí, eg vil reisa og volda at koma upp ímóti Bábylon ein savnað av miklum tjóðum frá norður landinum: og teir skulu stilla seg sjálvar í uppstilling ímóti henni; haðani frá skal hon verða tikin: teirra ørvar *skulu*

vera sum hjá einum mektigum alroyndum manni; eingin skal venda aftur til einkiðs.

10 Og Chăl-dĕ´-a skal verða eitt rán: allir, sum herja hana, skulu verða mettaðir, sigur HARRIN.

11 Av tí at tit vóru glaðir, av tí at tit fegnaðust, O tit oyðarar av mínum arvi, av tí at tit eru vaksnir feitir sum kvígan í grasi, og belja sum tarvar;

12 Skal tykkara móðir vera sára fjamskað; hon, sum føddi tykkum, skal skammast: sí, hin aftasta av tjóðunum *skal verða* eitt reyn, eitt turt land, og ein oyðimørk.

13 Vegna vreiði HARRANS skal tað ei verða búð í, men tað skal vera heil*veg*is oyði: hvør tann, ið fer framvið Bábylon, skal ógvast, og físa at øllum hennara plágum.

14 Stillið tykkum í uppstilling ímóti Bábylon runt umkring: allir tit sum spenna bogan, skjótið at henni, sparið ongar ørvar: tí at hon hevur syndað ímóti HARRANUM.

15 Rópið ímóti henni runt umkring: hon hevur givið hond sína: hennara grundvøllir eru falnir, hennara múrar eru tveittir niður: tí at tað *er* hevnd HARRANS: takið hevnd uppá hana; eins og hon hevur gjørt, gerið henni.

16 Skerið av sáðmannin frá Bábylon, og hann sum handfer akurknívin í heystartíðini: av ótta fyri tí kúgandi svørðinum skulu teir venda hvør *og* ēin til fólk sítt, og teir skulu flýggja hvør *og* ēin til egna land sítt.

17 ¶ Ísrael *er* ein spjaddur seyður; leyvurnar hava rikið *hann* burt: fyrst hevur kongurin av Assýriu upptært hann; og síðst hevur hesin Nĕ-bū-chăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon brotið hansara beinˇ.

18 Tessvegna, svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Sí, eg vil revsa kongin av Bábylon og land hansara, eins og eg havi revsað kongin av Assýriu.

19 Og eg vil føra Ísrael aftur til hansara bústað, og hann skal mata *sær* á Carmel og Bá´-sjăn, og hansara sál skal verða mettað uppiá Ē´-phră-ĭm fjalli og Gilead.

20 Í teimum døgum, og í teirri tíð, sigur HARRIN, skal Ísraels misgerð verða søkt eftir, og *har skal* eingin *vera;* og Judah syndir, og tær skulu ikki verða funnar: tí at eg vil náða teir sump eg leggi burturav.

21 ¶ Far niðan ímóti landi Mĕr-ă-thā´-ĭm-s, *enntá* ímóti tí, og ímóti íbúgvum Pĕ´-kŏd-s: oyð og aldeilis oyðilegg eftir teimum, sigur HARRIN, og ger samsvarandi við alt sum eg havi áboðið tær.

22 Eitt ljóð av bardaga *er* í landinum, og av miklari oyðing.

23 Hvør er hamari alrar jarðarinnar skorin sundur og brotin! hvør er Bábylon vorðin ein oyðing tjóðanna millum!

24 Eg havi lagt eina snerru til tín, og tú ert eisini tikin, O Bábylon, og tú vart ikki varug: tú ert funnin, og eisini fangað, av tí at tú hevurt strítt ímóti HARRANUM.

25 HARRIN hevur opnað sítt vápnahús, og hevur ført fram vápnini av síni harmavreiði: tí at hetta *er* verk Harrans GUÐS herliðanna í landi Chăl-dĕ´-anna.

26 Komið ímóti henni frá hinum ytsta marki, opnið hennara goymsluhúsˇ: laðið hana upp sum dungar, og oyðið hana fullkomiliga: latið einkið av henni vera eftir.

27 Vegið allar ungtarvar hennara; latið teir fara oman til slátringina: vei teimum! tí at teirra dagur er komin, og tíðin av teirra heimsøking.

28 Røddin á teimum ið flýggja og komast undan út úr landi Bábylons, at kunngera í Zion hevnd

HARRANS Guðs vár, hevnd halgidóms hans.

29 Kallið saman bogamenninar ímóti Bábylon: allir tit sum spenna bogan, leirist ímóti tí runt umkring; latið ongan av tí komast undan: endurgjaldið henni samsvarandi við hennara verk; samsvarandi við alt sum hon hevur gjørt, gerið henni: tí at hon hevur verið stolt ímóti HARRANUM, ímóti Hinum Heilaga Ísraels.

30 Tí skulu hennara ungu menn falla í gøtunum, og allir hennara krígsmenn skulu verða skornir av í tí degi, sigur HARRIN.

31 Sí, eg *eri* ímóti tær, *O tú* mest hugmóðiga, sigur Harrin GUÐ herliðanna: tí at dagur tín er komin, tíðin *sum* eg vil heimsøkja teg.

32 Og hin mest hugmóðigi skal snáva og falla, og eingin skal reisa hann upp: og eg vil kynda ein eld í hansara staðum, og hann skal upptæra alt rundan um hann.

33 ¶ Svá sigur HARRI herliðanna; børn Ísraels og børn Judah *vóru* kúgaðir tilsaman: og allir, sum tóku teir *til* fanga, hildu teim fast; teir sýttu at lata teir fara.

34 Teirra Endurloysari *er* sterkur; HARRI herliðanna *er* hans navn: hann skal grundigani føra teirra søk, at hann má geva hvílu til landið, og órógva íbúgvar Bábylons.

35 ¶ Eitt svørð *er* uppiá Chaldĕ´-unum, sigur HARRIN, og uppiá íbúgvum Bábylons, og uppiá hennara prinsum, og uppiá hennara vís*monnum*.

36 Eitt svørð *er* uppiá lygnarunum; og teir skulu tvætla: eitt svørð *er* uppiá hennara mektigu monnum; og teir skulu verða mótfalnir.

37 Eitt svørð *er* uppiá teirra hestum, og uppiá teirra vagnum, og uppiá øllum tí blandaða fólkinum sum *eru* í hennara miðju; og teir skulu gerast sum kvinnur: eitt svørð *er* uppiá hennara dýrgripum; og teir skulu verða rændir.

38 Ein turkur *er* uppiá hennara vøtnum; og tey skulu verða turkað upp: tí at tað *er* landið av ristum myndum, og teir eru ørir uppiá *sínum* skurðgudum.

39 Tí skulu hini villini djór oyðimarkarinnar við hinum villini djórum oyggjanna búgva *har,* og uglurnar skulu búgva harí: og tað skal ei meira verða bygt um ævir; eiheldur skal tað verða búð í frá ætt til ætt.

40 Eins og Guð kollrendi Sodomu og Gō-mŏr´-rŭh og granna *staðir* tess, sigur HARRIN; *soleiðis* skal eingin maður verða *verandi* har, eiheldur skal nakar menniskjusonur búgva harí.

41 Sí, eitt fólk skal koma frá norðan, og ein mikil tjóð, og mangir kongar skulu verða reistir upp frá breddum jarðarinnar.

42 Teir skulu halda boganum og langspjótinum: teir *eru* grimmir, og vilja ikki sýna miskunn: teirra rødd skal ýla sum sjógvurin, og teir skulu ríða uppiá hestum, *hvør og ēin* stillaður í uppstilling, eins og ein maður til bardagan, ímóti tær, O Bábylons dóttir.

43 Bábylons kongur hevur hoyrt ummælið um teir, og hans hendur vuksu máttleysar: angist tók hald á honum, *og* pínur sum hjá eini kvinnu í verkjum.

44 Sí, hann skal koma upp sum ein leyva frá bólgnan Jordans at býlinum hjá tí sterka: men eg vil fáa teir brádligani *at* renna burtur frá henni: og hvør *er* ein útvaldur *maður, sum* eg kann útnevna yvir henni? tí at hvør *er* líka *sum* eg? og hvør vil áseta mær tíðina? og hvør *er* hasin hirði, sum vil standa frammi fyri mær?

45 Tessvegna hoyrið tit ráðið

hjá HARRANUM, sum hann hevur lagt ímóti Bábylon; og hansara ráðagerðir, sum hann hevur avrátt ímóti landi Chăl-dĕ´-anna: Vissuliga, hin minsti av fylginum skal hála teir út: vissuligani skal hann gera *teirra* bústað oydnan við teimum.

46 Við ljóðið av takingini av Bábylon verður jørðin vikað, og geylið verður hoyrt tjóðanna millum.

KAPITUL 51

SVÁ sigur HARRIN; Sí, eg vil reisa upp ímóti Bábylon, og ímóti teimum sum búgva í miðju teirra sum rísa upp ímóti mær, ein oyðandi vind;

2 Og vil senda til Bábylon foykjarar, sum skulu foykja hana, og skulu tøma land hennara: tí at á trongdardeginum skulu teir vera ímóti henni runt umkring.

3 Ímóti *honum, sum* spennir, lat bogamannin spenna sín boga; og ímóti *honum, sum* lyftir seg upp í síni ringbrynju: og sparið tit ikki hennara ungu menn; oyðileggið tit fullkomiligani alt hennara herlið.

4 Soleiðis skulu hinir vignu falla í landi Chăl-dĕ´-anna; og *teir, sum eru* stoyttir ígjøgn, í gøtum hennara.

5 Tí at Ísrael *hevur* ikki *verðið* yvirgivin, ella Judah av Guði sínum, av HARRA herliðanna; tó *at* teirra land var fylt við synd ímóti Hinum Heilaga Ísraels.

6 Flýggið út úr miðjari Bábylon, og bjargi hvør maður síni sál: verðið ikki skornir av í hennara misgerð; tí at hetta *er* tíðin av HARRANS hevnd; hann vil rinda henni eitt endurgjald.

7 Bábylon *hevur verið* eitt gylt bikar í HARRANS hond, sum gjørdi alla jørðina drukna: tjóðirnar hava drukkið av víni hennara; tí eru tjóðirnar ørar.

8 Bábylon er brádligani fallin og oydd: ýlið yvir hana; takið balsam til hennara pínu, um so veri, *at* hon má verða grødd.

9 Vit vildu havt grøtt Bábylon, men hon er ikki grødd: yvirgevið hana, og latum oss fara hvør *og* ēin inn í sítt egna land: tí at hennara dómur røkkur at himni, og er lyftur upp *enntá* til skýanna.

10 HARRIN hevur ført fram okkara rættvísi: komið, og latum oss kunngera í Zion verk HARRANS Guðs várs.

11 Gerið bjartar ørvarnar; savnið skildirnar: HARRIN hevur reist upp andan hjá kongunum av Medunum: tí at hansara snildarráð *er* ímóti Bábylon, at oyða tað; av tí at tað *er* hevnd HARRANS, hevnd tempuls hans.

12 Setið upp hermerkið uppiá múrunum av Bábylon, gerið varðhaldið sterkt, setið upp varðmenninar, fyribúgvið loynisetrini: tí at HARRIN hevur bæði upphugsað og gjørt tað sum hann talaði ímóti íbúgvum Bábylons.

13 O tú sum býrt uppiá mongum vøtnum, ríkilig í dýrgripum, tín endi er komin, *og* mátið á tíni ágirndarsemi.

14 HARRI herliðanna hevur svorið við seg sjálvan, *sigandi,* Vissuliga, eg vil fylla teg við monnum, sum við jarðvargum; og teir skulu lyfta upp eitt róp ímóti tær.

15 Hann hevur gjørt jørðina við^ síni megi, hann hevur grundfest veraldina við^ sínum vísdómi, og hevur strekt út himinin við^ sínum skili.

16 Tá ið hann mælir *síni* rødd, *er* ein fjøld av vøtnum í himnunum; og hann elvir guvunum at stíga upp frá endum jarðarinnar: hann ger snarljós˘ við regni, og førir fram vindin úr sínum dýrgripagoymslum.

17 Hvør maður er óskynskur við^ *sínum* kunnleika; hvør stoyp-

ari er fjamskaður av hini ristu mynd: tí at hansara brædda mynd *er* fals, og *tað er* eingin andadráttur í teimum.

18 Tær *eru* fáfongd, verk villfaringa: í tíðini av teirra heimsøking skulu tær týnast.

19 Skamtur Jákobs *er* ikki líka *sum* tær; tí at hann *er* myndarin av øllum tingum: og *Ísrael er* sproti arvs hansara: HARRI herliðanna *er* hans navn.

20 Tú *ert* mín bardagaøks *og* krígsvápn: tí at við tær vil eg bróta í stykkir tjóðirnar, og við tær vil eg oyðileggja kongadømir;

21 Og við tær vil eg bróta í stykkir hestin og reiðmann hans; og við tær vil eg bróta í stykkir vagnin og reiðmann hans;

22 Við tær eisini vil eg bróta í stykkir mann og kvinnu; og við tær vil eg bróta í stykkir gamlan og ungan; og við tær vil eg bróta í stykkir ungmennið og moynna;

23 Eg vil eisini bróta í stykkir við tær hirðan og hansara fylgi; og við tær vil eg bróta í stykkir jarðyrkismannin og hans ok av oksum; og við tær vil eg bróta í stykkir høvuðsmenn og stjórnarar.

24 Og eg vil rinda at Bábylon og til alra íbúgvanna av Chăldĕ´-u alt teirra illa sum teir hava gjørt í Zion í eygsjón tykkara, sigur HARRIN.

25 Sí, eg *eri* ímóti tær, O oyðandi fjall, sigur HARRIN, sum oyðirt alla jørðina: og eg vil strekkja út mína hond omanyvir teg, og rulla teg niður frá klettunum, og vil gera teg *til* eitt brent fjall.

26 Og teir skulu ikki taka av tær ein stein til eitt hjørn, ella ein stein til grundvøllir; men tú skalt vera oyðin um ævir, sigur HARRIN.

27 Setið tit upp eitt hermerki í landinum, blásið lúðurin tjóðanna millum, fyrireikið tjóðirnar ímóti henni, kallið saman ímóti henni kongadømini av Âr´-â-răt, Mĭn´-nī, og Âsj´-chĕ-năz; útnevnið ein høvuðsmann ímóti henni; elvið hestunum at koma upp sum hinir grovu jarðvargar.

28 Fyrireikið ímóti henni tjóðirnar við kongunum hjá Medunum, høvuðsmonnum tess, og øllum stjórnarum tess, og øllum landi harradømis hans.

29 Og landið skal skelva og syrgja: tí at hvør ráðagerð hjá HARRANUM skal verða útint ímóti Bábylon, at gera Bábylons land eina oyðing uttan íbúgva.

30 Hinir mektigu menn Bábylons hava latið vera *við* at berjast, teir hava verðið verandi í *sínum* festningum: teirra megi hevur svitast; teir gjørdust sum kvinnur: teir hava brent hennara bústaðir; hennara lokur eru brotnar.

31 Eitt postboð skal renna at møta einum øðrum, og ein sendisveinur at møta einum øðrum, at sýna kongi Bábylons, at hansara staður er tikin úr *ĕinum* enda *av,*

32 Og at gjøgnumgongdirnar eru tiptar, og sevini hava teir brent við eldi, og krígsmenninir eru ræðsluslignir.

33 Tí at svá sigur HARRI herliðanna, Guð Ísraels; Bábylons dóttir *er* eins og eitt treskigólv, *tað er* tíð at treskja hana: enn ein lítil stund, og tíðin av hennara heysti skal koma.

34 Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr, Bábylons kongur, hevur upptært meg, hann hevur knúst meg, hann hevur gjørt meg *til* eitt tómt ílat, hann hevur svølgt meg upp eins og ein dreki, hann hevur fylt sín búk við mínum krásum, hann hevur kastað meg út.

35 Harðskapurin, gjørdur við meg og við kjøt mítt, *veri* uppiá Bábylon, skal íbúgvin av Zion siga; og mítt blóð uppiá íbúgvum Chăl-dĕ´-u, skal Jerusalem siga.

36 Tessvegna, svá sigur HARRIN;
Sí, eg vil føra tína søk, og taka
hevnd fyri teg; og eg vil turka
upp sjógv hennara, og gera henn-
ara lindir turrar.
37 Og Bábylon skal gerast
rúgvur, ein bústaður til drekar,
ein øtan, og ein fising, uttan
íbúgva.
38 Teir skulu ýla tilsaman líka
sum leyvur: teir skulu skrála sum
leyvuhvølpar.
39 Í teirra hita vil eg gera
teirra veitslur, og eg vil gera teir
druknar, at teir mega fegnast, og
sova ein viðvarandi svøvn, og ikki
vakna, sigur HARRIN.
40 Eg vil føra teir niður líka
sum lomb til slátringina, líka *sum*
veðrar við geitabukkum.
41 Hvør er Sjē´-sjăch tikin! og
hvør er lov alrar jarðarinnar ov-
farin! hvør er Bábylon vorðin
ein øtan tjóðanna millum!
42 Sjógvurin er komin upp
uppá Bábylon: hon er huld við
fjøldini av hans aldum.
43 Hennara staðir eru ein oyð-
ing, eitt turt land, og eitt reyn,
eitt land, hvarí eingin maður býr,
eiheldur fer *nakar* menniskjuson-
ur framvið harhjá.
44 Og eg vil revsa Bel í Báby-
lon, og eg vil føra fram út úr
hans munni tað sum hann hevur
svølgt upp: og tjóðirnar skulu
ikki floyma saman meira at hon-
um: ja, Bábylons múrur skal falla.
45 Fólk mítt, farið tit út úr
hennara mittu, og bjargið tit hvør
maður síni sál frá hini grimmu
firtni HARRANS.
46 Og at ikki tykkara hjarta ør-
maktist, og tit óttist fyri gramli-
num sum skal verða hoyrt í
landinum; eitt graml skal bæði
koma *ēitt* ár, og eftir tað í *einum*
øðrum ári *skal koma* eitt graml,
og harðskapur í landinum, stjórn-
ari ímóti stjórnara.
47 Tessvegna, sí, teir dagar
koma, at eg vil inna dóm oman-
yvir hinar ristu myndir Bábylons:
og alt hennara land skal verða
fjamskað, og allir hennara vignu
skulu falla í hennara mittu.
48 Tá skal himinin og jørðin,
og alt sum *er* harí, syngja yvir
Bábylon: tí at herjararnir skulu
koma at henni úr norðan, sigur
HARRIN.
49 Eins og Bábylon *hevur elvt*
hinum vignu Ísraels at falla, so-
leiðis í Bábylon skulu falla hinir
vignu alrar jarðarinnar.
50 Tit, sum hava komist undan
svørðinum, farið avstað, standið
ikki stillir: minnist HARRAN langt
burturifrá, og latið Jerusalem
koma inn í tykkara huga.
51 Vit eru fjamskaðir, av tí at
vit hava hoyrt skemd: skomm
hevur hult okkar andlit˘: tí at
fremmandir eru komnir inn í
halgidómar HARRANS húss.
52 Hvørsvegna, sí, teir dagar
koma, sigur HARRIN, at eg vil
inna dóm omanyvir hennara ristu
myndir: og gjøgnum alt hennara
land skulu hinir særdu eymka *seg*.
53 Hóast Bábylon skuldi hevjað
seg upp til himins, og hóast hon
skuldi vígvirkjað hæddina av síni
styrki, *tó* frá mær skulu herjarar
koma at henni, sigur HARRIN.
54 Eitt ljóð av einum geyli *kem-*
ur frá Bábylon, og mikil oyðilegg-
ing frá landi Chăl-dē´-anna:
55 Av tí at HARRIN hevur herj-
að Bábylon, og oytt úr henni hina
miklu rødd; tá ið hennar aldur
ýla eins og mikil vøtn, verður eitt
ljóð av teirra rødd úttalað:
56 Av tí at herjarin er komin
uppá hana, *enntá* uppá Báby-
lon, og hennara mektigu menn
eru tiknir, hvør *og* ēin av teirra
bogum er brotin: tí at HARRIN
Guð endurgjaldna skal vissuliga
viðurgjalda.
57 Og eg vil gera druknar henn-
ara prinsar, og hennara vís*menn*,

hennara høvuðsmenn, og hennara stjórnarar, og hennara mektigu menn: og teir skulu sova ein viðvarandi svøvn, og ikki vakna, sigur Kongurin, hvørs navn *er* HARRI herliðanna.

58 Svá sigur HARRI herliðanna; Teir breiðu múrarnir av Bábylon skulu fullkomiliga verða brotnir, og hennara høgu portur skulu verða brend við eldi; og menniskjuni skulu streva til fánýtis, og fólkið í eldinum, og teir skulu verða útlúgvaðir.

59 ¶ Orðið, sum Jeremiah prophetur ábjóðaði Sẽ-rāĭ´-āh Nẽ´-rĭ-āh syni Mā-ā-sēj´-āh syni, tá ið hann fór við Zẽd-ẽ-kĭ´-āh, kongi Judah, inn í Bábylon í hinum fjórða ári av síni ríkjan. Og *hesin* Sẽ-rāĭ´-āh *var* ein stillur prinsur.

60 So Jeremiah skrivaði í eina bók alt tað illa sum skuldi koma uppá Bábylon, *enntá* øll hesi orð sum eru skrivað ímóti Bábylon.

61 Og Jeremiah segði til Sẽ-rāĭ´-āh, Tá ið tú kemurt til Bábylon, og skalt sjá, og skalt lesa øll hesi orð;

62 Tá skalt tú siga, O HARRI, tú hevurt talað ímóti hesum plássi, at skera tað av, at eingin skal verða verandi í tí, hvørki maður ella djór, men at tað skal vera oyði um ævir.

63 Og tað skal verða, tá ið tú hevurt lokið við at lesa hesa bók, *at* tú skalt binda ein stein til hennara, og kasta hana inn í miðjuna av Ēv-phrā´-tēs:

64 Og tú skalt siga, Svá skal Bábylon søkka, og skal ikki rísa frá tí illa sum eg vil føra uppá hana: og teir skulu vera útlúgvaðir. So langt *eru* orðini av Jeremiah.

KAPITUL 52

ZẼD-Ẽ-KĬ´-ĀH *var* ēin og tjúgu ára gamalur tá ið hann byrjaði at ríkja, og hann ríkti ellivu ár í Jerusalem. Og navn móður hansara *var* Há´-mŭ-tăl, dóttir Jeremiah úr Lĭb´-năh.

2 Og hann gjørdi *tað sum* ilt *var* í eygum HARRANS, samsvarandi við alt sum Jẽ-hŏĭ´-ă-kĭm hevði gjørt.

3 Tí at gjøgnum firtni HARRANS bar tað á í Jerusalem og Judah, til hann hevði kastað teir út frá síni nærveru, at Zẽd-ẽ-kĭ´-āh gjørdi uppreist ímóti kongi Bábylons.

4 ¶ Og tað bar á í tí níggjunda árinum av hans ríkjan, í tí tíggjunda mánaðinum, í tí tíggjunda *deginum* av mánaðinum, *at* Nẽ-bŭchăd-rēz´-zâr kongur av Bábylon kom, hann og allur hans herur, ímóti Jerusalem, og uppsló ímóti honum, og bygdi festningar ímóti honum runt umkring.

5 So staðurin varð kringsettur at hinum ellivta ári Zẽd-ẽ-kĭ´-āh kongs.

6 Og í tí fjórða mánaðinum, í tí níggjunda *deginum* av mánaðinum, var hungursneyðin svár í staðinum, so at tað var einkið breyð til fólk landsins.

7 Tá varð staðurin brotin inn í, og allir krígsmenninir flýddu, og fóru fram út úr staðinum um náttina eftir vegi portursins ímillum múrarnar tveir, sum *var* hjá urtagarði kongsins; (nú, Chăl-dē´-arnir *vóru* við staðin runt umkring:) og teir fóru eftir vegi slættarins.

8 ¶ Men herurin hjá Chăldē´-unum elti eftir kongi, og innheintaði Zẽd-ẽ-kĭ´-āh á slættum Jerichos; og allur hans herur varð spjaddur frá honum.

9 Tá tóku teir kong, og bóru hann niðan at kongi Bábylons til Rĭb´-lăh í landi Há´-măth-s; har hann lýsti dóm omanyvir hann.

10 Og kongur Bábylons vá synirnar hjá Zẽd-ẽ-kĭ´-āh frammi fyri eygum hans: hann vá eisini allar prinsarnar av Judah í Rĭb´-lăh.

11 Tá koyrdi hann út eyguni á Zẽd-ẽ-kĭ´-āh; og kongur Bábylons

bant hann í ketur, og bar hann til Bábylon, og koyrdi hann í fongsul til dags deyða hans.

12 ¶ Nú, í hinum fimta mánaði, í hinum tíggjunda *degi* mánaðarins, sum *var* tað nítjanda árið hjá Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongi av Bábylon, kom Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, *sum* tænti kongi Bábylons, inn í Jerusalem,

13 Og brendi hús HARRANS, og kongshúsið; og øll húsini av Jerusalem, og øll húsini hjá hinum miklu *monnum,* brendi hann við eldi:

14 Og allur herurin hjá Chăl-dē´-unum, sum *vóru* við høvuðsmanni lívverjunnar, brutu niður allar múrarnar av Jerusalem runt umkring.

15 Tá bar Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, burt *til* fanga *ávísar* av hinum fátøku fólksins, og hitt eftirverandi av fólkinum sum var eftir í staðinum, og teir sum fullu burtur, sum fullu til kongsins av Bábylon, og restina av fjøldini.

16 Men Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, eftirlæt *ávísar* av hinum fátøku landsins sum víngarðsmenn og sum jarðyrkismenn.

17 Eisini súlurnar av messing sum *vóru* í húsi HARRANS, og undirstøðurnar, og messing sjógvin sum *var* í húsi HARRANS, brutu Chăl-dē´-ararnir, og bóru allan messingin av teimum til Bábylon.

18 Stórketlarnar eisini, og skuplurnar, og ljósasaksarnar, og skálirnar, og sleivirnar, og øll reiðini av messing — hvarvið teir tæntu, tóku teir burtur.

19 Og kørini, og eldpannurnar, og skálirnar, og stórketlarnar, og ljósastakarnar, og sleivirnar, og bikørini, *tað* sum *var* av gulli *í* gulli, og *tað* sum *var* av silvuri *í* silvuri, tók høvuðsmaðurin av lívverjuni burtur.

20 Tær tvær súlurnar, ēin sjógv, og tólv messing tarvar sum *vóru* undir undirstøðunum, sum Sálomon kongur hevði gjørt í húsi HARRANS: messingurin av øllum hesum reiðunum var uttan vekt.

21 Og *viðvíkjandi* súlunum, hæddin á ēinari súlu *var* átjan alnir; og eitt áslag á tólv alnir kringfór hana; og tjúkdin hará *var* fýra fingrar: *hon var* innantóm.

22 Og eitt stólpahøvd av messing *var* uppiá henni; og hæddin á ēinum stólpahøvdi *var* fimm alnir, við flættiverki og granateplum uppiá stólpahøvdunum runt íkring, alt *av* messing. Hin onnur súlan eisini og granateplini *vóru* lík hesum˘.

23 Og tað vóru níti og seks granateplir á ēinari síðu; *og* øll granateplini uppiá flættiverkunum *vóru* hundrað rundan um.

24 ¶ Og høvuðsmaðurin av lívverjuni tók Sĕ-rāĭ´-ăh fremsta prest, og Zê-phăn´-jăh hin annan prest, og teir tríggjar vørðir hurðarinnar:

25 Hann tók eisini úr staðinum ein hirðmann, sum hevði áleggingina av krígsmonnunum; og sjey menn av teimum sum vóru nær persóni kongs, sum vórðu funnir í staðinum; og hin høvuðs skriftlærda hjá herliðinum, sum mynstraði fólk landsins; og trísinstjúgu menn av fólki landsins, sum vórðu funnir í miðjum staðinum.

26 So Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaður lívverjunnar, tók teir, og førdi teir til kongsins av Bábylon til Rĭb´-lăh.

27 Og kongurin av Bábylon sló teir, og tók teir av lívi í Rĭb´-lăh í landi Há´-măth-s. Svá varð Judah borin burt *til* fanga út úr egna landi sínum.

28 Hetta *er* fólkið sum Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr bar burt *til* fanga:

í tí sjeynda árinum trý túsund Jødar og trý og tjúgu:

29 Í tí átjanda árinum hjá Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr-i bar hann burt *til* fanga frá Jerusalem átta hundrað *og* tríati og tveir persónar:

30 Í tí trý og tjúgunda árinum hjá Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr-i bar Nĕ-bŭ-zâr´-ăd´-ăn, høvuðsmaðurin av lívverjuni, burt *til* fanga av Jødunum sjey hundrað *og* fýrati og fimm persónar: allir persónarnir *vóru* fýra túsund og seks hundrað.

31 ¶ Og tað bar á í tí sjey og tríatiunda árinum av fangaskapi Jĕ-hōĭ´-ă-chĭn-s kongs av Judah, í hinum tólvta mánaði, í hinum fimm og tjúgunda *degi* mánaðarins, *at* Ē´-vĭl-mĕr´-ŏ-dăch kongur av Bábylon í tí *fyrsta* árinum av síni ríkjan lyfti upp høvur Jĕ-hōĭ´-ă-chĭn-s kongs av Judah, og førdi hann fram út úr fongsli,

32 Og talaði blídliga við hann, og setti hans hásæti uppum hásætið hjá kongunum sum *vóru* við honum í Bábylon,

33 Og skifti hansara fongsulsklæðir: og hann áframhaldandi át breyð frammi fyri honum allar dagar lívs síns.

34 Og *til* hansara kost varð ein áframhaldandi kostur givin honum av kongi Bábylons, hvønn dag ein skamtur inntil dags deyða hans, allar dagar lívs hans.

HARMLJÓÐINI

HJÁ JEREMIAH.

KAPITUL 1

HVØR situr staðurin ēinligur, *sum var* fullur av fólki! *hvør* er hon vorðin eins og ein einkja! hon *sum var* mikil tjóðanna millum, *og* prinsessa fylkjanna millum, *hvør* er hon vorðin íkastsskyldig!

2 Hon grætur sáran um náttina, og hennara tár *eru* á hennara kinnum: millum alra sína alskara hevur hon ongan at ugga *seg:* allir hennara vinir hava farið svikræðisligani við henni, teir eru vorðnir hennara fíggindar.

3 Judah er farin inn í fangaskap uppá grund av kvøljan, og uppá grund av miklari trælkan: hon býr hinna heidnu millum, hon finnur onga hvíld: allir hennara atsøkjarar innheintaðu hana ímillum treingingarnar.

4 Vegir Zions harma, av tí at eingir koma til hátíðar-veitslurnar: øll hennara portur eru oyðin: hennara prestar suffa, hennara moyggjar eru nívdar, og hon *er* í beiskleika.

5 Hennara mótstandarar eru hinir fremstu, hennara fíggindar framganga; tí at HARRIN hevur nívt hana fyri fjøldina av hennara misbrotum: hennara børn eru farin inn í fangaskap frammi fyri fíggindanum.

6 Og frá Zions dóttur er allur hennara vakurleiki vikin: hennara prinsar eru vorðnir líka *sum* hjørtir *sum* einkið beiti finna, og teir eru farnir uttan styrki frammi fyri eltaranum.

7 Jerusalem mintist í døgunum av síni nívd og av sínum vesældómum øll síni dámligu ting sum hon hevði í fyrndardøgunum, tá ið hennara fólk fell inn í fíggindans hond, og eingin hjálpti henni: mótstandararnir sóu hana, *og* háðaðu eftir hennara sabbatum.

8 Jerusalem hevur herviligani syndað; tí er hon firrað: allir, sum

heiðraðu hana, vanvirða hana, av tí at teir hava sæð hennara nakni: ja, hon suffar, og vendir aftureftir.

9 Hennara gravskitinsemi *er* í hennara skeytum; hana minnist ikki sín síðsta enda; tí kom hon niður undursamligani: hon hevði ongan uggara. O HARRI, sí mína nívd: tí at fíggindin hevur gjørt *seg* stóran.

10 Mótstandarin hevur breitt út sína hond omanyvir øll hennara dámligu ting: tí at hon hevur sæð, *at* hinir heidnu innfóru inn í hennara halgidóm; hvørjum tú ábeyðst, *at* teir skuldu ikki innfara inn í tína samkomu.

11 Alt hennara fólk suffar, teir søkja breyð; teir hava givið síni dámligu ting fyri mat til at linna um sálina: síggj, O HARRI, og umhugsa; tí at eg eri vorðin ønskrilig.

12 ¶ *Er tað* einkið fyri tykkum, allir tit sum fara framvið? síggið, og vitið um tað veri nøkur sorg lík míni sorg, sum er gjørd innat mær, hvarvið HARRIN hevur nívt *meg* á degi grimmu firtni sínar.

13 Úr erva hevur hann sent eld inn í míni bein, og hann hevur yvirvág ímóti teimum: hann hevur breitt eitt net til mínar føtur, hann hevur vent mær tilbakar: hann hevur gjørt meg oydna *og* ørmaktaða allan dagin.

14 Okið av mínum misbrotum er bundið av hans hond: tey eru flættaði, *og* komin upp uppá mín háls: hann hevur fingið mína styrki at falla, Harrin hevur flýggjað meg inn í hendur *teirra, frá hvørjum*[p] eg eri ikki førur fyri at rísa upp.

15 Harrin hevur traðkað undir fót allar mínar mektigu *menn* í miðjari mær: hann hevur kallað ein savnað ímóti mær at knúsa mínar ungu menn: Harrin hevur troðið jomfrúnna, Judah dóttur, *sum* í einum vínfargi.

16 Fyri hesi *ting* eg gráti; mítt eyga, mítt eyga rennur niður við vatni, av tí at uggarin, sum skuldi linna um mína sál, er fjart frá mær: míni børn eru oyðin, av tí at fíggindin hevði yvirvág.

17 Zion breiðir fram sínar hendur, *og tað er* eingin at ugga hana: HARRIN hevur áboðið viðvíkjandi Jákobi, *at* hansara mótstandarar *skuldu vera* runt umkring hann: Jerusalem er sum ein mánasjúkusom kvinna teirra millum.

18 ¶ HARRIN er rættvísur; tí at eg havi gjørt uppreist ímóti hansara boði: hoyrið, eg biði tykkum, øll fólk, og síggið mína sorg: mínar jomfrýr og mínir ungu menn eru farin inn í fangaskap.

19 Eg kallaði eftir elskarum mínum, *men* teir teipaðu meg: mínir prestar og mínir elstu góvu upp andan í staðinum, meðan teir søktu sín mat til at linna um sínar sálir.

20 Sí, O HARRI; tí at eg *eri* í neyð: mínar innangoymslur eru órógvaðar; mítt hjarta er vent innan í mær; tí at eg havi herviligani gjørt uppreist: útium rænir svørðið, heima *er* sum deyði.

21 Teir hava hoyrt, at eg suffi: *tað er* eingin at ugga meg: allir mínir fíggindar hava hoyrt um mína trongd; teir eru glaðir, at tú hevurt gjørt *tað:* tú vilt koma við deginum *sum* tú hevurt kallað, og teir skulu vera líkir mær.

22 Lat alla teirra vondsku koma framfyri teg; og ger innat teimum, eins og tú hevurt gjørt innat mær fyri øll míni misbrot: tí míni suff *eru* mong, og mítt hjarta *er* ørmaktað.

KAPITUL 2

HVØR hevur Harrin dekkað Zions dóttur við einum skýggi í síni firtni, *og* kastað niður frá himni á jørðina Ísraels vakurleika, og mintist ikki sín fótskammul á deginum av síni firtni!

2 Harrin hevur svølgt upp allar bústaðirnar hjá Jákobi, og hevur ikki tikið synd í: hann hevur kastað niður í síni vreiði hervirkini hjá dóttur Judah; hann hevur ført *tey* niður til jørðina: hann hevur dálkað kongadømið og prinsar tess.

3 Hann hevur skorið av í *síni* grimmu firtni alt horn Ísraels: hann hevur drigið tilbakar sína høgru hond frammi undan fíggindanum, og hann brendi ímóti Jákobi sum ein logandi eldur, *sum* upptærir runt umkring.

4 Hann hevur spent sín boga líka *sum* ein figgindi: hann stóð við síni høgru hond sum ein mótstandari, og vó allar *sum vóru* dámligir fyri eyganum í tabernakli Zions dóttur: hann helti út sína øði sum eld.

5 Harrin var sum ein fíggindi: hann hevur svølgt upp Ísrael, hann hevur svølgt upp øll hennara slott: hann hevur oytt hansara hervirkir, og hevur økt í dóttur Judah venan og harman.

6 Og hann hevur harðligani tikið burtur sítt tabernakkul, sum *um tað var av* einum urtagarði: hann hevur oytt síni pláss savnaðarins: HARRIN hevur volt hátíðar-veitslunum og sabbatunum at verða gloymdum í Zion, og hevur vanvirt í harmavreiðini av síni firtni kongin og prestin.

7 Harrin hevur kastað av sítt altar, honum hevur stiknast við sín halgidóm, hann hevur givið upp inn í figgindans hond múrarnar av hennara slottum; teir hava gjørt eitt ljóð í húsi HARRANS, sum á deginum av hátíðarveitslu.

8 HARRIN hevur avrátt at oyða múr Zions dóttur: hann hevur tant út eina *máti*linju, hann hevur ikki aftrað sína hond frá at oyða: tí fekk hann virkisgarðin og múrin at harmast; teir fána tilsaman.

9 Hennara portur eru sokkin inn í jørðina; hann hevur oytt og brotið hennara lokur: hennara kongur og hennara prinsar *eru* Heidninganna millum: lógin *er* ei *meira;* hennara prophetar eisini finna onga sjón frá HARRANUM.

10 Hinir elstu Zions dóttur sita uppiá jørðini, *og* halda tøgn: teir hava kastað upp dust uppá síni høvur; teir hava gyrt seg við sekkjaklæði: Jerusalems jomfrýr hanga niður síni høvur til jarðarinnar.

11 Míni eygu bila við tárum, mínir innvølir eru órógvaðir, mín livur er helt uppá jørðina, fyri oyðing dóttur fólks míns; av tí at børnini og bróstabørnini svíma í gøtum staðarins.

12 Tey siga til møðra sína, Hvar *er* korn og vín? tá ið tey svímaðu eins og teir særdu í gøtum staðarins, tá ið teirra sál varð helt út í barmin hjá teirra móður.

13 Hvat ting skal eg taka til vitnis fyri teg? hvat ting skal eg líkna við teg, O Jerusalems dóttir? hvat skal eg javna við teg, at eg má ugga teg, O jomfrú dóttir Zions? tí at skarð títt *er* mikið líka *sum* sjógvurin: hvør kann grøða teg?

14 Tínir prophetar hava sæð fáfongd og fávitskut ting til tín: og teir hava ikki avdekkað tína misgerð, til at venda burt tín fangaskap; men hava sæð til tín falskar byrðar og elvingar til burtvísing.

15 Allir, ið fara framvið, klappa *sínar* hendur at tær; teir físa og vagga sínum høvdi at Jerusalems dóttur, *sigandi, Er* hetta staðurin sum *menn* kalla Vakurleikans fullkominleika, Frøi alrar jarðarinnar?

16 Allir tínir fíggindar hava opnað sín munn ímóti tær: teir físa og grísla tennurnar: teir siga, Vit hava svølgt *hana* upp: vissuliga, hetta *er* dagurin sum vit

væntaðu eftir; vit hava funnið, vit hava sæð *tað*.

17 HARRIN hevur gjørt *tað* sum hann hevði upphugsað; hann hevur uppfylt sítt orð sum hann hevði skipað í fyrndardøgunum: hann hevur tveitt niður, og hevur ikki tikið synd í: hann hevur elvt *tínum* fígginda at fegnast yvir tær, hann hevur sett upp hornið hjá tínum mótstandarum.

18 Teirra hjarta rópti á Harran, O múrur Zions dóttur, lat tár renna niður sum ein á dag og nátt: gev tær onga hvíld; lat ikki tín eygnastein halda uppat.

19 Reis *teg,* rópa út um náttina: í byrjanini av vøkunum stoyt út títt hjarta sum vatn frammi fyri andliti Harrans: lyft upp tínar hendur mótvegis honum fyri lív ungu barna tína, sum maktast av hungri á hvørjum gøtumóti.

20 ¶ Síggj, O HARRI, og umhugsa við hvønn tú hevurt gjørt hetta. Skulu kvinnurnar eta sín ávøkst, *og* børn eina sponn til longdar? skulu presturin og propheturin verða vignir í halgidómi Harrans?

21 Hin ungi og hin gamli liggja á jørðini í gøtunum: mínar jomfrýr og mínir ungu menn eru fallin við svørðinum; tú hevurt vigið *tey* á degi firtni tínar; tú hevurt dripið, *og* ikki tikið synd í.

22 Tú hevurt kallað sum á einum hátíðardegi mínar ræðslur runt umkring, so at á deginum av HARRANS firtni eingin komst undan, ella varð eftir: tey, sum eg havi sveipað og alt upp, hevur mín fíggindi upptært.

KAPITUL 3

EG *eri* maðurin, *sum* hevur sæð nívd við sprota vreiðis hansara.

2 Hann hevur leitt meg, og ført *meg inn í* myrkur, men ikki *inn í* ljós.

3 Vissuliga, ímóti mær er hann vendur; hann vendir síni hond *ímóti mær* allan dagin.

4 Mítt kjøt og mína húð hevur hann gjørt gomul; hann hevur brotið míni bein.

5 Hann hevur bygt ímóti mær, og umringað *meg* við galli og strevi.

6 Hann hevur sett meg í myrk pláss, eins og *teir ið veri seg* deyðir frá gomlum *av*.

7 Hann hevur girt meg íkring, at eg kann ikki komast út: hann hevur gjørt mína leinkju tunga.

8 Eisini tá ið eg geyli og rópi, lokar hann úti mína bøn.

9 Hann hevur innilokað mínar vegir við høgdum steini, hann hevur gjørt mínar leiðir krókutar.

10 Hann *var* mær *eins og* ein bjørn, liggjandi á lúri; *og sum* ein leyva í loyndum plássum.

11 Hann hevur vent til viks mínar vegir, og togað meg í stykkir: hann hevur gjørt meg oydnan.

12 Hann hevur spent sín boga, og sett meg sum eitt mál hjá ørvini.

13 Hann hevur volt ørvunum av sínum ørvahúsa at innfara inn í míni nýru.

14 Eg var ein speireking fyri øllum mínum fólki; *og* teirra sangur allan dagin.

15 Hann hevur fylt meg við beiskleika, hann hevur gjørt meg druknan við malurt.

16 Hann hevur eisini brotið mínar tenn við eyr steinum, hann hevur hult meg við øskum.

17 Og tú hevurt firrað mína sál langt burtur frá friði: eg gloymdi framgongd.

18 Og eg segði, Mín styrki og mín vón er týnd frá HARRANUM:

19 Komandi til hugs mína nívd og mín vesældóm, malurtina og gallin.

20 Mín sál hevur *tey* enn í endurminning, og er eyðmjúkgjørd í mær.

21 Hetta eg kalli aftur til hugar
míns, tessvegna havi eg vón.
22 ¶ *Tað er av* HARRANS miskunnum at vit eru ikki upptærdir,
av tí at hansara várkunnir svíkja
ikki.
23 *Tær eru* nýggjar hvønn morgun: stór *er* tín trúfesti.
24 HARRIN *er* skamtur mín, sigur mín sál; tí vil eg vóna á hann.
25 HARRIN *er* góður at teimum
ið bíða eftir honum, mót teirri sál
sum søkir hann.
26 *Tað er* gott, at *ein maður*
skuldi bæði vónað og stillisliga
bíðað eftir frelsu HARRANS.
27 *Tað er* gott fyri ein mann,
at hann beri okið í sínum ungdómi.
28 Hann situr einsamallur og
heldur tøgn, av tí at hann hevur
borið *tað* uppiá sær.
29 Hann setur sín munn í dustið; um so veri, *at* vón kann vera.
30 Hann gevur *sín* kjálka til
hansara sum slær hann: hann er
fyltur fullur við skemd.
31 Tí at Harrin vil ikki kasta av
um ævir:
32 Men hóast hann elvi harm,
tó vil hann hava miskunn samsvarandi við fjøldina av sínum
miskunnum.
33 Tí at hann nívir ikki villiga,
ella harmar mannabørnini.
34 At knúsa undir sínar føtur
allar fangar jarðarinnar,
35 At venda til viks rættin hjá
einum manni frammi fyri andliti
hins mest Høga,
36 At hvølva ein mann í hansara søk, *tað* Harrin viðurkennir
ikki.
37 ¶ Hvør *er* hann *sum* sigur,
og tað ber á, *tá ið* Harrin ikki
ábýður *tað?*
38 Út úr munni hins mest
Høga útgongur ikki ilt og gott?
39 Hví kvartar livandi maður,
ein maður um revsingina av sínum syndum?
40 Latum okkum kanna og
royna okkara vegir, og venda aftur til HARRANS.
41 Latum okkum lyfta upp okkara hjarta við *okkara* hondum at
Guði í himnunum.
42 Vit hava misbrotist og hava
gjørt uppreist: tú hevurt ikki
náðað.
43 Tú hevurt hult við firtni, og
søkt at okkum: tú hevurt vigið, tú
hevurt ikki tikið synd í.
44 Tú hevurt dekkað teg sjálvan
við einum skýggi, at *okkara* bønir
skuldu ei fara ígjøgn.
45 Tú hevurt gjørt okkum *sum*
sópið og vrak*vøruna* í miðjum
fólkinum.
46 Allir okkara fíggindar hava
opnað sínar munnar ímóti okkum.
47 Ótti og ein snerra er komin
uppá okkum, avtoftan og oyðing.
48 Mítt eyga rennur niður við
løkum av vatni fyri oyðing dóttur
fólks míns.
49 Mítt eyga trillar niður, og
gevst ikki, uttan nakað íhald,
50 Til HARRIN líti niður, og
skoði frá himni.
51 Mítt eyga ávirkar mítt hjarta
uppá grund av øllum døtrunum
hjá mínum staði.
52 Mínir fíggindar jagstraðu
meg sáran, sum ein fuglur, uttan
grund.
53 Teir hava avskorið mítt lív
í fangatippinum, og kastað ein
stein omanyvir meg.
54 Vøtn floymdu yvir mítt høvur; *tá* segði eg, Eg eri avskorin.
55 ¶ Eg kallaði uppá navn títt,
O HARRI, úr hinum lága fangatippi.
56 Tú hevurt hoyrt mína rødd:
fjal ikki títt oyra við mína anding,
við mítt róp.
57 Tú dróst nær á tí degi *sum*
eg kallaði uppá teg: tú segðirt,
Óttast ikki.

58 O Harri, tú hevurt vart málini hjá míni sál; tú hevurt endurloyst mítt lív.
59 O HARRI, tú hevurt sæð mín órætt: døm tú mítt mál.
60 Tú hevurt sæð alla teirra hevnd *og* allar teirra ímyndingar ímóti mær.
61 Tú hevurt hoyrt teirra háð, O HARRI, *og* allar teirra ímyndingar ímóti mær;
62 Varrarnar á teimum ið risu upp ímóti mær, og teirra snildarráð ímóti mær allan dagin.
63 Sí teirra siting niðri, og teirra rísing upp; eg *eri* teirra tónleikur.
64 ¶ Rinda at teimum eitt endurgjald, O HARRI, samsvarandi við verkið av teirra hondum.
65 Gev teimum hjartasorg, tína banning at teimum.
66 Atsøk og oyðilegg teir í firtni undan himnum HARRANS.

KAPITUL 4

HVØR er gullið vorðið kámt! *hvør* er tað mest fína gullið broytt! steinar halgidómsins eru heltir út á hvørjum gøtumóti.
2 Hinir dýrabæru synir Zions, samberligir við fínt gull, hvør eru teir mettir sum leirkrukkur, verkið av hondum leirkerasmiðarins!
3 Sjálvt sjóskrímslini hála út bróstið, tey geva hinum ungu sínum *at* súgva: dóttir fólks míns *er vorðin* grim, sum strutsarnir í oyðuni.
4 Tungan hjá tí súgvandi barninum krøkist til góman á hansara munni av torsta: hini ungu børn umbiðja breyð, *og* eingin maður brýtur *tað* at teimum.
5 Teir, sum føddu *seg* stásiliga, standa á berum í gøtunum: teir, sum vórðu uppaldir í skarlak, umfevna tøðrúgvur.
6 Tí at revsingin av misgerð dóttur fólks míns er størri enn revsingin av synd Sodomu, sum varð kollrend sum í einum eygnabragdi, og ongar hendur styðjaðust á hana.
7 Nazaritarnir hjá henni vóru skírari enn snjó, teir vóru hvítari enn mjólk, teir vóru meiri reyðdæmdir í likami enn rubīnar, teirra pussing *var* av sapphīr:
8 Teirra ásjón er svartari enn eitt kol; teir eru ikki kendir á gøtunum: teirra húð krøkist til teirra bein; hon er følnað, hon er vorðin sum ein kvistur.
9 *Teir, sum veri seg* vignir við svørðinum, eru betri enn *teir sum veri seg* vignir við hungri: tí at hesir fána burt, slignir ígjøgn vegna *trot á* akursins ávøkstum.
10 Hendur hinna vesæligu kvenna hava soðið teirra egnu børn: tey vóru teirra matur í oyðing dóttur fólks míns.
11 HARRIN hevur fullført sína øði; hann hevur helt út sína grimmu firtni, og hevur kynt ein eld í Zion, og hann hevur upptært tess grundvøllir.
12 Kongar jarðarinnar, og allir íbúgvar veraldarinnar, vildu ikki havt trúð, at mótstandarin og figgindin skuldu havt innfarið inn í portrini av Jerusalem.
13 ¶ Fyri syndirnar hjá hennara prophetum, *og* misgerðirnar hjá hennara prestum, sum hava úthelt blóð hinna rættlátu í hennara mittu,
14 Hava teir reikað *sum* blindir *menn* í gøtunum, teir hava dálkað seg sjálvar við blóði, so at menn kundu ikki nema *við* teirra klæðir.
15 Teir geylaðu at teimum, Víkið tit; *tað er* óreint; víkið, víkið, nemið ikki *við:* tá ið teir flýddu burt og reikaðu, søgdu teir hinna heidnu millum, Teir skulu ikki meira útisita *har.*
16 HARRANS firtni hevur deilt teir *sundur;* hann vil ei meira gáa eftir teimum: teir mettu ikki persónar prestanna, teir góðvildaðu ikki hinar elstu.

17 Hvat okkum viðvíkur, okkar eygu, sum enn *er,* bilaðu vegna okkara fáfongdu hjálp: í vári vaktan hava vit vaktað eftir eini tjóð, *sum* kundi ikki frelsa *okkum*.

18 Teir jagstra okkara fetˇ, at vit kunnu ikki fara á okkara gøtum: okkar endi er nær, okkara dagar eru uppfyltir; tí at okkar endi er komin.

19 Okkar atsøkjarar eru snarari enn ørnir himinsins: teir eltu okkum uppiá fjøllunum, teir lógu *á* lúri eftir okkum í oyðuni.

20 Andadrátturin av okkara nasum, HARRANS salvaði, varð tikin í teirra holur, um hvønn vit søgdu, Undir hans skugga skulu vit liva hinna heidnu millum.

21 ¶ Fegnast og ver glað, O Ē´-dóm-s dóttir, sum býrt í Ûz landi; bikarið eisini skal fara ígjøgnum til tín: tú skalt verða drukkin, og skalt gera teg nakna.

22 ¶ Revsingin av tíni misgerð er fullførd, O Zions dóttir; hann vil ikki meira bera teg burtur í fangaskap: hann vil heimsøkja tína misgerð, O Ē´-dóm-s dóttir; hann vil avhylja tínar syndir.

KAPITUL 5

MINST til, O HARRI, hvat er komið uppá okkum: umhugsa, og skoða okkara skemd.

2 Vár arvur er vendur til fremmandra, vári hús til ókunnumanna.

3 Vit eru foreldraloysingar og faðirleys, okkara møður *eru* sum einkjur.

4 Vit hava drukkið okkara vatn fyri pening; okkara viður er seldur at okkum.

5 Okkara hálsar *eru* undir atsókn: vit strevast, *og* hava onga hvíld.

6 Vit hava givið hondina *til* Egyptanna, *og til* Assýrianna, at verða mettaðir við breyði.

7 Okkara fedrar hava syndað, *og eru* ikki; og vit hava borið teirra misgerðir.

8 Tænarar hava stjórnað yvir okkum: *tað er* eingin sum útfríar *okkum* úr teirra hond.

9 Vit fingu okkara breyð við *vandanum um* okkara lívˇ vegna svørð oyðunnar.

10 Okkara húð var svørt sum ein ovnur uppá grund av tí ræðuligu hungursneyðini.

11 Teir neyðtóku kvinnurnar í Zion, *og* moyggjarnar í staðunum av Judah.

12 Prinsar eru hongdir upp av teirra hond: andlitini á elstum vórðu ikki ærd.

13 Teir tóku teir ungu menninar at mala *á kvørn,* og børnini fullu undir viðinum.

14 Teir elstu eru hildnir uppat frá portrinum, teir ungu menninir frá sínum tónleiki.

15 Frøin hjá okkara hjarta er hildin uppat; okkara dansur er vendur yvirí harman.

16 Krúnan er fallin *frá* høvdi várum: vei okkum, at vit hava syndað!

17 Fyri hetta er okkara hjarta ørmaktað; fyri hesi *ting* eru okkar eygu kám.

18 Uppá grund av fjalli Zions, sum er oyði, revarnir ganga uppiá tí.

19 Tú, O HARRI, verðurt verandi um ævir; títt hásæti frá ætt til ætt.

20 Hví gloymirt tú okkum um ævir, *og* yvirgevurt okkum so langa tíð?

21 Vend tú okkum at tær, O HARRI, og vit skulu verða vendir; endurnýggja okkara dagar sum í forðum.

22 Men tú hevurt fullkomiliga havnað okkum; tú ert sera vreiður ímóti okkum.

BÓK PROPHETSINS
EZEKIEL.

KAPITUL 1

NÚ, tað bar á í tí tríatiunda árinum, í tí fjórða *mánaðinum,* í hinum fimta *degi* mánaðarins, sum eg *var* fanganna millum við Chē´-bâr-s ánna, *at* himnarnir vórðu opnaðir, og eg sá Guðs-sjónir.

2 Í hinum fimta *degi* mánaðarins, sum *var* hitt fimta árið av fangaskapi Jĕ-hŏĭ´-ă-chĭn-s kongs,

3 Kom orð HARRANS týðiliga at Ê-zēk´-îēl presti, syni Bŭ´-zī-s, í landi Chăl-dē´-anna við Chē´-bâr-s ánna; og hond HARRANS var har uppiá honum.

4 ¶ Og eg hugdi, og sí, ein meldurvindur kom út úr norðan, eitt mikið skýggj, og ein eldur innballandi seg sjálvan, og ein bjartleiki *var* umkring hann, og út úr miðjuni harav sum liturin á ravgulum, út úr miðjum eldinum.

5 Eisini út úr miðjum tí *kom* líkleikin á fýra livandi skepnum. Og henda *var* útsjónd teirra; tær høvdu líkleikan av einum manni.

6 Og hvør *og* ēin hevði fýra andlit, og hvør *og* ēin hevði fýra veingir.

7 Og teirra føtur *vóru* beinir føtur; og ilin á teirra fótum *var* líka sum ilin á einum kálvsfóti: og tær glitraðu sum liturin á blankaðum messingi.

8 Og *tær høvdu* hendurnar á einum manni undir veingjum sínum á sínum fýra síðum; og tær fýra høvdu andlit síni og veingir sínar.

9 Teirra veingir *vóru* sameinaðir hvør til annan; tær vendu ikki tá ið tær fóru; tær fóru hvør *og* ēin beint frameftir.

10 Hvat viðvíkur líkleikanum á teirra andlitum, tær fýra høvdu andlitið á einum manni, og andlitið á eini leyvu, høgrumegin: og tær fýra høvdu andlitið á einum oksa vinstrumegin; tær fýra eisini høvdu andlitið á eini ørn.

11 Svá *vóru* andlitini hjá teimum: og teirra veingir *vóru* strektir uppeftir; tveir *veingir* hjá hvørjum *og* ēinum *vóru* sameinaðir hvør til annan, og tveir dekkaðu teirra likam˘.

12 Og tær fóru hvør *og* ēin beint frameftir: hvagar andin átti at fara, fóru tær; *og* tær vendu ikki tá ið tær fóru.

13 Hvat viðvíkur líkleikanum á teimum livandi skepnunum, teirra útsjónd *var* eins og brennandi kol˘ av eldi, *og* eins og útsjóndin á lampum: tað fór upp og niður millum hinna livandi skepna; og eldurin var bjartur, og út úr eldinum fór fram snarljós.

14 Og hinar livandi skepnur runnu og vendu aftur eins og útsjóndin á einum glampa av snarljósi.

15 ¶ Nú, sum eg skoðaði hinar livandi skepnur, sí ēitt hjól uppiá jørðini við hinar livandi skepnur, við sínum fýra andlitum.

16 Útsjóndin á hjólunum og teirra verki *var* líkt litinum á einum berylli: og tær fýra høvdu ēin líkleika: og teirra útsjónd og teirra verk *var* sum var tað eitt hjól í miðjuni av einum hjóli.

17 Tá ið tær fóru, fóru tær uppiá sínum fýra síðum: *og* tær vendu ikki tá ið tær fóru.

18 Hvat teirra ringum viðvíkur, teir vóru so høgir, at teir vóru ótiligir, og teirra ringar *vóru* fullir av eygum runt umkring tær fýra.

19 Og tá ið hinar livandi skepnur fóru, fóru hjólini við tey: og tá ið hinar livandi skepnur vórðu hevjaðar upp frá jørðini, vórðu hjólini hevjaði upp.

20 Hvagarsumhelst *ið* andin átti at fara, fóru tær, hagar *átti* andi *teirra* at fara; og hjólini vórðu hevjaði upp yvir av teimum: tí at andin hjá teimum livandi skepnunum *var* í hjólunum.
21 Tá ið hasi fóru, fóru *hesi;* og tá ið hasi stóðu, stóðu *hesi;* og tá ið hasi vórðu hevjaði upp frá jørðini, vórðu hjólini hevjaði upp yvir av teimum: tí at andin hjá teimum livandi skepnunum *var* í hjólunum.
22 Og líkleikin á hválvinum uppiá høvdunum á teimum livandi skepnunum *var* sum liturin á hini ræðuligu krystall, strekt fram yvir høvdini hjá teimum uppiyvir.
23 Og undir hválvinum *vóru* teirra veingir beinir, tann ēini ímóti hīnum: hvør *og* ēin hevði tveir sum dekkaðu hesumegin, og hvør *og* ēin hevði tveir sum dekkaðu hasumegin, likamini hjá teimum.
24 Og tá ið tær fóru, hoyrdi eg ljóðið av veingjum teirra, eins og ljóðið av miklum vøtnum, eins og rødd hins Almáttuga, røddin av talu, sum ljóðið av einum herliði: tá ið tær stóðu, sigu tær niður sínar veingir.
25 Og har var ein rødd frá hválvinum, sum *var* yvir teirra høvdum, tá ið tær stóðu, *og* høvdu sigið niður sínar veingir.
26 ¶ Og uppiyvir hválvinum, sum *var* yvir teirra høvdum, *var* líkleikin á einum hásæti, sum útsjóndin á einum sapphīr steini: og uppiá líkleikanum á hásætinum *var* líkleikin sum útsjóndin á einum manni uppiyvir uppiá tí.
27 Og eg sá sum litin á ravgulum, sum útsjóndina á eldi rundan um innan í tí, frá útsjóndini á hansara lendum enntá uppeftir, og frá útsjóndini á hansara lendum enntá niðureftir, sá eg sum var tað útsjóndin á eldi, og tað hevði bjartleika runt umkring.
28 Eins og útsjóndin á boganum sum er í skýgginum á regnsdeginum, soleiðis *var* útsjóndin á bjartleikanum runt umkring. Henda *var* útsjóndin á líkleikanum á dýrd HARRANS. Og tá ið eg sá *hana,* fell eg uppá andlit mítt, og eg hoyrdi eina rødd á ēinum sum talaði.

KAPITUL 2

OG hann segði við meg, Menniskjusonur, statt uppá tínar føtur, og eg vil tala við teg.
2 Og andin innfór inn í meg, tá ið hann talaði við meg, og setti meg uppá mínar føtur, at eg hoyrdi hann sum talaði við meg.
3 Og hann segði við meg, Menniskjusonur, eg sendi teg til Ísraels barna, til eina uppreistrarsama tjóð sum hevur gjørt uppreist ímóti mær: teir og teirra fedrar hava misbrotist ímóti mær, *alt* at sjálvum hesum degi.
4 Tí at *teir eru* ónærislig børn og stívhjartaðir. Eg sendi teg at teimum; og tú skalt siga við teir, Svá sigur Harrin GUÐ.
5 Og teir, hvørt teir vilji hoyra, ella hvørt teir vilji lata vera, (tí at teir *eru* eitt uppreistrarsamt hús,) tó skulu vita, at tað hevur verið ein prophetur teirra millum.
6 ¶ Og tú, menniskjusonur, ver ikki ræddur fyri teimum, eisheldur ver ræddur fyri orðunum hjá teimum, tó *at* tistlar og tornir *veri seg* hjá tær, og tú búgvi sporðdreka millum: ver ikki ræddur fyri orðunum hjá teimum, ella ver mótfallin við eygnabráini hjá teimum, tó *at* teir *veri* eitt uppreistrarsamt hús.
7 Og tú skalt tala orðini hjá mær yvirat teimum, hvørt teir vilji hoyra, ella hvørt teir vilji lata vera: tí at teir *eru* mest uppreistrarsamir.

8 Men tú, menniskjusonur, hoyr hvat eg sigi við teg; Vert ikki tú uppreistrarsamur eins og hatta uppreistrarsama hús: opna tín munn, og et tað *sum* eg gevi tær.

9 ¶ Og tá ið eg hugdi, sí, ein hond *varð* send at mær; og sí, ein rulla av eini bók *var* harí;

10 Og hann breiddi hana frammanfyri mær; og hon *var* skrivað innan og uttan: og *har var* skrivað harí harmljóð, og venan, og vei.

KAPITUL 3

HARAFTURAT segði hann við meg, Menniskjusonur, et tað tú finnurt; et hesa rullu, og far *og* tala yvirat húsi Ísraels.

2 So eg opnaði mín munn, og hann voldi mær at eta ta rulluna.

3 Og hann segði við meg, Menniskjusonur, fá búk tín at eta, og fyll tínar innvølir við hesi rullu sum eg gevi tær. Tá át eg *hana;* og hon var í mínum munni sum hunangur í søtsemi.

4 ¶ Og hann segði við meg, Menniskjusonur, far, slepp tær at húsi Ísraels, og tala við orðum mínum yvirat teimum.

5 Tí at tú *ert* ikki sendur til fólks av eini fremmandari talu og av einum torførum tungumáli, *men* til húsar Ísraels;

6 Ikki til mangt fólk av eini fremmandari talu og av einum torførum tungumáli, hvørs orð tú kanst ikki skilja. Vissuliga, hevði eg sent teg til teirra, vildu teir havt lýtt á teg.

7 Men hús Ísraels vil ikki lýða á teg; tí at teir vilja ikki lýða á meg: tí at alt hús Ísraels *eru* ónærisligir og harðhjartaðir.

8 Sí, eg havi gjørt títt andlit sterkt ímóti andlitum teirra, og títt enni sterkt ímóti ennum teirra.

9 Sum ein diamant, harðari enn tinnustein, havi eg gjørt títt enni: óttast teir ikki, eiheldur ver mótfallin við eygnabráini hjá teimum, tó *at* teir *veri seg* eitt uppreistrarsamt hús.

10 Harafturat segði hann við meg, Menniskjusonur, øllum orðum mínum, sum eg skal tala við teg, móttak í hjarta títt, og hoyr við oyrum tínum.

11 Og far, slepp tær til teirra av fangaskapinum, at børnum fólks tíns, og tala yvirat teimum, og sig teimum, Svá sigur Harrin GUÐ; hvørt teir vilji hoyra, ella hvørt teir vilji lata vera.

12 Tá tók andin meg upp, og eg hoyrdi aftanfyri meg eina rødd av eini miklari súsan, *sigandi,* Vælsignað *veri* dýrd HARRANS frá plássi hans.

13 *Eg hoyrdi* eisini ljóðið av veingjunum hjá teimum livandi skepnunum sum nurtu við hvør annan, og ljóðið av hjólunum yvir av teimum, og eitt ljóð av eini miklari súsan.

14 So andin lyfti meg upp, og tók meg avstað, og eg fór í beiskleika, í hita anda míns; men hond HARRANS var sterk uppiá mær.

15 ¶ Tá kom eg til teirra av fangaskapinum við Tĕl-ā´-bîb, sum dvaldust við Chē´-bâr-s ánna, og eg sat har teir sótu, og varð verandi har ógvaður teirra millum sjey dagar.

16 Og tað bar á við endan á sjey døgum, at orð HARRANS kom at mær, sigandi,

17 Menniskjusonur, eg havi gjørt teg ein varðmann yvirfyri húsi Ísraels: tessvegna hoyr orðið av mínum munni, og gev teimum ávaring frá mær.

18 Tá ið eg sigi við hin vonda, Tú skalt vissuliga doyggja; og tú gevurt honum ikki ávaring, ella talart til *tess* at ávara hin vonda frá hansara vonda vegi, at frelsa hansara lív; skal hin sami vondi *maður* doyggja í síni mis-

gerð; men hansara blóð vil eg krevja av tíni hond.

19 Tó um tú ávari hin vonda, og hann vendi ikki frá síni vondsku, ella frá sínum vonda vegi, skal hann doyggja í síni misgerð; men tú hevurt útfríað tína sál.

20 *Upp*aftur, Tá ið ein rættvísur *maður* vendir frá síni rættvísi, og fremur misgerð, og eg leggi ein snávingarstein frammanfyri honum, hann skal doyggja: av tí at tú hevurt ikki givið honum ávaring, hann skal doyggja í síni synd, og hansara rættvísi, sum hann hevur gjørt, skal ikki verða mint; men hansara blóð vil eg krevja av tíni hond.

21 Hóast hetta, um tú ávari hin rættvísa *mann,* at hin rættvísi syndi ikki, og hann syndar ikki, hann skal vissuliga liva, av tí at hann er ávaraður; eisini tú hevurt útfríað tína sál.

22 ¶ Og HARRANS hond var har uppiá mær; og hann segði við meg, Reis *teg,* far fram á slættan, og eg vil har tala við teg.

23 Tá reistist eg, og fór fram á slættan: og sí, dýrd HARRANS stóð har, eins og dýrdin sum eg sá við Chĕ́bâr-s ánna: og eg fell á andlit mítt.

24 Tá innfór andin inn í meg, og setti meg uppá mínar føtur, og talaði við meg, og segði við meg, Far, loka teg innanfyri hús títt.

25 Men tú, O menniskjusonur, sí, teir skulu seta bond uppá teg, og skulu binda teg við teimum, og tú skalt ikki fara út teirra millum:

26 Og eg vil fáa tína tungu at loða við góman á munni tínum, at tú skalt vera málleysur, og skalt ikki vera fyri teimum ein formanari: tí at teir *eru* eitt uppreistrarsamt hús.

27 Men tá ið eg tali við teg, vil eg opna tín munn, og tú skalt siga við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Hann, sum hoyrir, lat hann hoyra; og hann, sum letur vera, lat hann lata vera: tí at teir *eru* eitt uppreistrarsamt hús.

KAPITUL 4

TÚ eisini, menniskjusonur, tak tær ein tigul*stein,* og legg hann frammanfyri tær, og avmynda uppá hann staðin, *enntá* Jerusalem:

2 Og set kringseting ímóti honum, og bygg ein festning ímóti honum, og laða ein virkisgarð ímóti honum; set leirin eisini ímóti honum, og set múrbrótarar ímóti honum runt umkring.

3 Harafturat tak tú at tær eina jarn pannu, og set hana *fyri* ein múr av jarni ímillum teg og staðin: og set títt andlit ímóti honum, og hann skal verða kringsettur, og tú skalt seta kringseting ímóti honum. Hetta *skal vera* eitt tekin fyri húsi Ísraels.

4 Ligg tú eisini uppiá tíni vinstru lið, og legg misgerðina hjá húsi Ísraels uppá hana: *samsvarandi* við talið á døgunum, sum tú skalt liggja uppiá henni, skalt tú bera teirra misgerð.

5 Tí at eg havi lagt uppá teg árini av teirra misgerð, samsvarandi við talið á døgunum, trý hundrað og níti dagar: soleiðis skalt tú bera misgerðina hjá Ísraels húsi.

6 Og tá ið tú hevurt fullført teir, ligg aftur á tíni høgru lið, og tú skalt bera misgerðina hjá Judah húsi *í* fjøruti dagar: eg havi ásett tær hvønn dag fyri eitt ár.

7 Tí skalt tú seta títt andlit ímóti kringseting Jerusalems, og tín armur *skal vera* avdekkaður, og tú skalt prophetera ímóti tí.

8 Og sí, eg vil leggja bond uppá teg, og tú skalt ikki venda tær frá ēini lið til aðra, til tú hevurt endað dagarnar av tíni kringseting.

9 ¶ Tak tú eisini at tær hveiti, og bygg, og bønir, og flatbønir, og hirsu, og spelt, og set tey í ēitt ílat, og ger tær breyð úr tí, *samsvarandi* við talið á døgunum sum tú skalt liggja uppá tíni lið, trý hundrað og níti dagar skalt tú eta av tí.

10 Og tín matur, sum tú skalt eta, *skal vera* eftir vekt, tjúgu sjē-kl-ar á dag: av og á skalt tú eta tað.

11 Tú skalt drekka eisini vatn eftir máli, sættapartin av eini hîn: av og á skalt tú drekka.

12 Og tú skalt eta tað *sum* bygg køkur, og tú skalt baka tað við mykju, sum kemur út úr manni, í eygsjón teirra.

13 Og HARRIN segði, Enntá svá skulu Ísraels børn eta sítt dálkaða breyð Heidninganna millum, hvagar eg vil reka teir.

14 Tá segði eg, Á, Harri GUÐ! sí, mín sál hevur ei verðið óreinkað: tí at frá mínum ungdómi uppeftir, enntá til nú, havi eg ikki etið av tí sum doyr av sær sjálvum, ella er skrætt í stykkir; eiheldur kom tað andstyggiligt kjøt inn í mín munn.

15 Tá segði hann við meg, Sí, eg havi givið tær kúarmykju fyri mansmykju, og tú skalt fyribúgva breyð títt harvið.

16 Harafturat segði hann við meg, Menniskjusonur, sí, eg vil bróta breyðsstavin í Jerusalem: og teir skulu eta breyð eftir vekt, og við súr; og teir skulu drekka vatn eftir máli, og við ógvan:

17 At teim má skorta breyð og vatn, og vera ógvaðir hvør við øðrum, og tæra burt fyri teirra misgerð.

KAPITUL 5

OG tú, menniskjusonur, tak tær ein hvassan knív, tak tær rakiknív hjá einum hárskera, og fá *hann* at fara uppá høvur títt og uppá skegg títt: síðan tak tær vágskálir at viga, og deil *hárið*.

2 Tú skalt brenna við eldi ein triðjapart í miðjum staðinum, tá ið dagarnir av kringsetingini eru uppfyltir: og tú skalt taka ein triðjapart, *og* sláa umkring hann við einum knívi: og ein triðjapart skalt tú spjaða í vindinum; og eg vil draga út eitt svørð eftir teimum.

3 Tú skalt eisini taka harav nøkur fá í tali, og binda tey í faldir tínar.

4 So tak av teimum aftur, og kasta tey inn í miðjan eldin, og brenn tey í eldinum; *tí at* harúr skal ein eldur koma fram inn í alt hús Ísraels.

5 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Hetta *er* Jerusalem: eg havi sett hana í miðju tjóðanna og landanna *sum eru* rundan um hana.

6 Og hon hevur broytt mínar dómar yvirí vondsku meir enn tjóðirnar, og mínar ásetingar meir enn londini sum *eru* rundan um hana: tí at teir hava havnað mínum dómum og mínum ásetingum, teir hava ikki gingið í teimum.

7 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tit margfaldaðu meir enn tjóðirnar sum *eru* rundan um tykkum, *og* hava ikki gingið í mínum ásetingum, eiheldur hava hildið mínar dómar, eiheldur hava gjørt samsvarandi við dómarnar hjá tjóðunum sum *eru* rundan um tykkum;

8 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg, enntá eg, *eri* ímóti tær, og vil útinna dómar í miðjari tær í eygsjón tjóðanna.

9 Og eg vil gera í tær tað sum eg havi ikki gjørt, og hvarat eg vil ikki gera meira hitt líka, uppá grund av øllum andstygdum tínum.

10 Tí skulu fedrarnir eta synirnar í miðjari tær, og synirnir skulu eta fedrar sínar; og eg vil útinna dómar í tær, og alla leivd-

ina av tær vil eg spjaða inn í allar vindarnar.

11 Hvørsvegna, *sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ; Vissuliga, av tí at tú hevurt seyrgað mín halgidóm við øllum tínum andskræmiligu tingum, og við øllum tínum andstygdum, tí vil eg eisini minka um *teg;* hvørki skal eyga mítt eira, eiheldur vil eg hava nakra samkenslu.

12 ¶ Ein triðjipartur av tær skal doyggja við drepsóttini, og við hungursneyð skulu teir verða upptærdir í miðjari tær: og ein triðjipartur skal falla við svørðinum rundan um teg; og eg vil spjaða ein triðjapart inn í allar vindarnar, og eg vil draga út eitt svørð eftir teimum.

13 Svá skal mín firtni verða fullført, og eg vil volda míni øði at hvíla uppiá teimum, og eg vil verða uggaður: og teir skulu vita, at eg, HARRIN, havi talað *tað* í vandlæti mínum, tá ið eg havi fullført mína øði í teimum.

14 Hartil vil eg gera teg oydna, og eina skemd millum tjóðanna sum *eru* rundan um teg, í eygsjón alra sum fara framvið.

15 Soleiðis skal tað vera eitt spott og ein glósa, ein leiðbeining og ein ótan at tjóðunum sum *eru* rundan um teg, tá ið eg skal útinna dómar í tær í firtni og í øði og í øðisligum hartingum. Eg, HARRIN, havi talað *tað*.

16 Tá ið eg skal senda uppá teir hinar illu ørvar av hungursneyð, sum skulu vera til *teirra* oyðing, *og* sum eg vil senda at oyða tykkum: og eg vil økja um hungursneyðina uppiá tykkum, og vil bróta tykkara breyðsstav:

17 Soleiðis vil eg senda omanyvir tykkum hungursneyð og ónd djór, og tey skulu fráræna tær; og drepsótt og blóð skal fara ígjøgnum teg; og eg vil føra svørðið uppá teg. Eg, HARRIN, havi talað *tað*.

KAPITUL 6

OG HARRANS orð kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, set títt andlit mótvegis Ísraels fjøllum, og prophetera ímóti teimum,

3 Og sig, Tit Ísraels fjøll, hoyrið orð Harrans GUÐS; Svá sigur Harrin GUÐ til fjallanna, og til heyggjanna, til løkjanna, og til dalanna; Sí, eg, *enntá* eg, vil føra eitt svørð omanyvir tykkum, og eg vil oyðileggja tykkara høgu pláss.

4 Og tykkara altar skulu verða oyðin, og tykkara myndir skulu verða brotnar: og eg vil kasta niður tykkara vignu *menn* frammanfyri skurðgudum tykkara.

5 Og eg vil leggja tey deyðu ræini av Ísraels børnum frammanfyri skurðgudum teirra; og eg vil spjaða tykkara bein rundan um altarini hjá tykkum.

6 Í øllum tykkara bústøðum skulu staðirnir verða lagdir *í* oyði, og tey høgu plássini skulu verða oyðin; at tykkara altar mega verða løgd *í* oyði og gjørd oyðin, og tykkara skurðgudar mega verða brotnir og halda uppat, og tykkara myndir mega verða skornar niður, og tykkara verk mega verða gjørd til einkiðs.

7 Og hinir vignu skulu falla í tykkara mittu, og tit skulu vita at eg *eri* HARRIN.

8 ¶ Tó vil eg eftirlata eina leivd, at tit mega hava *nakrar* sum skulu komast undan svørðinum tjóðanna millum, tá ið tit skulu verða spjaddir gjøgnum londini.

9 Og teir, sum komast undan av tykkum, skulu minnast til mín tjóðanna millum, hvagar teir skulu verða bornir fangar, av tí at eg eri brotin við teirra horuta hjarta, sum hevur vikið frá mær, og við teirra eygum, sum fara horandi eftir skurðgudum teirra:

og teir skulu vamlast við seg sjálvar fyri tey illindir sum teir hava framt í øllum andstygdum sínum.
10 Og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN, *og at* eg havi ikki sagt til fánýtis, at eg vildi gera hetta illa at teimum.
11 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Slá við hond tíni, og trampa við fóti tínum, og sig, Ákk fyri allar hinar illu andstygdir Ísraels húss! tí at teir skulu falla við sverðinum, við hungursneyðini, og við drepsóttini.
12 Hann, sum er langt burturi, skal doyggja av drepsóttini; og hann, sum er nær, skal falla við sverðinum; og hann, sum er verandi og verður kringsettur, skal doyggja við hungursneyðini: svá vil eg fullføra mína øði uppá teir.
13 Tá skulu tit vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið teirra vignu *menn* skulu vera millum skurðguda teirra rundan um altarini hjá teimum, uppiá hvørjum høgum heyggi, á øllum fjallatoppunum, og undir hvørjum grønum træi, og undir hvørji tjúkkari eik, plássið – har teir ofraðu søtan anga til alra skurðguda sína.
14 So vil eg strekkja út mína hond omanyvir teir, og gera landið oyði, ja, meiri oyði enn oyðan ímóti Dib-lath, í øllum teirra bústøðum: og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 7

HARAFTURAT kom orð HARRANS at mær, sigandi,
2 Eisini, tú menniskjusonur, svá sigur Harrin GUÐ við land Ísraels; Ein endi, endin er komin uppá hini fýra hjørn landsins.
3 Nú *er* endin *komin* uppá teg, og eg vil senda mína firtni omanyvir teg, og vil døma teg samsvarandi við tínar vegir, og vil endurgjalda uppá teg allar tínar andstygdir.
4 Og mítt eyga skal ikki eira teg, eiheldur vil eg taka synd í: men eg vil endurgjalda tínar vegir omanyvir teg, og tínar andstygdir skulu vera í miðjum tær: og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.
5 Svá sigur Harrin GUÐ; Eitt ilt, eitt einans ilt, sí, er komið.
6 Ein endi er komin, endin er komin: hann vakir eftir tær; sí, hann er komin.
7 Morgunin er komin at tær, O tú sum býrt í landinum: tíðin er komin, trongdardagurin *er* nær, og ikki ljóðingin aftur av fjøllunum.
8 Nú vil eg fljótliga hella út mína øði omanyvir teg, og fullføra mína firtni uppá teg: og eg vil døma teg samsvarandi við tínar vegir, og vil endurgjalda tær fyri allar tínar andstygdir.
9 Og mítt eyga skal ikki eira, eiheldur vil eg taka synd í: eg vil endurgjalda tær samsvarandi við tínar vegir og tínar andstygdir, *sum* eru í miðjum tær; og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN, sum slær.
10 Sí dagin, sí, hann er komin: morgunin er farin út; sprotin hevur blómkað, dramblæti hevur spírað.
11 Harðskapur er risin upp til ein sprota av vondsku: eingin av teimum *skal verða verandi,* ella av teirra fjøld, ella av nøkrum av teirra: eiheldur *skal verða* gráting yvir teir.
12 Tíðin er komin, dagurin nærkast: lat ikki keyparan fegnast, ella seljaran harmast: tí at vreiði *er* uppiá allari fjøld tess.
13 Tí at seljarin skal ei venda aftur til tess sum er selt, hóast teir vóru enn á lívi: tí at sjónin *er* viðvíkjandi allari fjøld tess, *sum* skal ei venda aftur; eiheldur skal nakar styrkja seg sjálvan í misgerð lívs síns.
14 Teir hava blást lúðurin, enntá til at gera allar tilreiðar; men

eingin fer til bardagan: tí at mín vreiði *er* uppiá allari fjøld tess.

15 Svørðið *er* uttanfyri, og drepsóttin og hungursneyðin innanfyri: hann, sum *er* í akrinum, skal doyggja við svørðinum; og hann, sum *er* í staðinum, hungursneyð og drepsótt skulu upptæra hann.

16 ¶ Men teir, sum komast undan av teimum, skulu komast undan, og skulu vera á fjøllunum sum dúgvur úr dølunum, allir av teimum harmandi, hvør *og* ein fyri sína misgerð.

17 Allar hendur skulu vera máttleysar, og øll knø skulu vera veik *sum* vatn.

18 Teir skulu eisini gyrða *seg* við sekkjaklæði, og ræðsla skal hylja teir; og skomm *skal vera* uppiá øllum andlitum, og skallutsemi uppiá øllum teirra høvdum.

19 Teir skulu kasta sítt silvur í gøturnar, og teirra gull skal verða burtflutt: teirra silvur og teirra gull skal ikki verða ført fyri at bjarga teimum á deginum av vreiði HARRANS: teir skulu ikki metta sínar sálir, eiheldur fylla sínar innvølir: av tí at tað er snávingarsteinurin av teirra misgerð.

20 ¶ Hvat viðvíkur vakurleika prýðisluts hansara, hann setti hann í hátign: men teir gjørdu myndirnar av sínum andstygdum *og* av sínum andskræmiligu tingum harí: tí havi eg sett tað fjart frá teimum.

21 Og eg vil geva tað inn í hendur hinna fremmandu til eina bráð, og til jarðarinnar vondu til ein fong; og teir skulu óreinka tað.

22 Mítt andlit vil eg venda eisini frá teimum, og teir skulu óreinka mítt loyniliga *pláss:* tí at ránsmenninir skulu innfara inn í tað, og dálka tað.

23 ¶ Ger eina ketu: tí at landið er fult av blóðigum brotsverkum, og staðurin er fullur av harðskapi.

24 Hvørsvegna eg vil føra hinar ringastu av teimum heidnu, og teir skulu ognast hús teirra: eg vil eisini fáa skrúð teirra sterku at halda uppat; og teirra heilagu pláss skulu verða dálkað.

25 Oyðing kemur; og teir skulu søkja frið, og *har skal* eingin *vera*.

26 Mein skal koma omaná mein, og graml skal vera omaná graml; tá skulu teir søkja eina sjón av prophetinum; men lógin skal týnast frá prestinum, og ráð frá teimum elligomlu.

27 Kongurin skal harmast, og prinsurin skal verða klæddur við oyðing, og hendurnar á fólki landsins skulu verða órógvaðar: eg vil gera teimum eftir vegi teirra, og samsvarandi við teirra tilvinningar vil eg døma teir; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 8

OG tað bar á í tí sætta árinum, í hinum sætta *mánaði,* í hinum fimta *degi* mánaðarins, *sum* eg sat í húsi mínum, og hinir elstu av Judah sótu frammi fyri mær, at hond Harrans GUÐS fell har uppá meg.

2 Tá skoðaði eg, og sí ein líkleiki sum útsjóndin á eldi: frá útsjóndini á hansara lendum enntá niðureftir, eldur; og frá hansara lendum enntá uppeftir, sum útsjóndin á bjartleika, sum liturin á ravgulum.

3 Og hann setti fram skapið á eini hond, og tók meg eftir einum lokki høvurs míns; og andin lyfti meg upp ímillum jørðina og himinin, og førdi meg í Guðs-sjónunum til Jerusalem, til dyrnar av tí innara portrinum sum horvir ímóti norðan; hvar *var* sæti ástbrelnis-myndarinnar, sum tirrar til ástbrelnis.

4 Og sí, dýrd Guðs Ísraels *var* har, samsvarandi við sjónina sum eg sá á slættanum.

5 ¶ Tá segði hann við meg, Menniskjusonur, lyft upp eygum tínum nú vegin ímóti norðan. So eg lyfti upp eygum mínum vegin ímóti norðan, og sí norðanfyri við portur altarsins hendan ástbrelnis-myndin í inngongdini.

6 Hann segði framvegis við meg, Menniskjusonur, sært tú hvat teir gera? *enntá* hinar miklu andstygdir sum hús Ísraels fremur her, at eg skuldi fara langt burtur frá halgidómi mínum? men vend tær enn *og* aftur, *og* tú skalt síggja miklari andstygdir.

7 ¶ Og hann førdi meg til dyrnar av forgarðinum; og tá ið eg hugdi, sí eitt hol í múrinum.

8 Tá segði hann við meg, Menniskjusonur, grava nú í múrin: og tá ið eg hevði grivið í múrin, sí ein hurð.

9 Og hann segði við meg, Far inn, og skoða hinar vondu andstygdir sum teir gera her.

10 So eg fór inn og sá; og sí hvørt skap av skriðkyktum, og andstyggiligum djórum, og allir avgudar Ísraels húss, avmyndað uppá múrin rundan um.

11 Og tað stóðu frammanfyri teimum sjeyti menn av hinum elligomlu Ísraels húss, og í teirra mittu stóð Já-ă-zăn´-jăh Sjá´-phăn-s sonur, við hvør maður sínum roykilsiskeri í síni hond; og eitt tjúkt skýggj av roykilsi fór upp.

12 Tá segði hann við meg, Menniskjusonur, hevurt tú sæð hvat hinir elligomlu Ísraels húss gera í myrkrinum, hvør maður í kømrum síns bílætarís? tí at teir siga, HARRIN sær okkum ikki; HARRIN hevur yvirgivið jørðina.

13 ¶ Hann segði eisini við meg, Vend tær enn *og* aftur, *og* tú skalt síggja miklari andstygdir sum teir gera.

14 Tá førdi hann meg til dyrnar á portrinum av húsi HARRANS, sum *var* ímóti norðan; og sí, har sótu kvinnur, grátandi um Tăm´-mŭz.

15 ¶ Tá segði hann við meg, Hevurt tú sæð *hetta*, O menniskjusonur? vend tær enn *og* aftur, *og* tú skalt síggja miklari andstygdir enn hesar.

16 Og hann førdi meg inn í hin innara forgarðin av HARRANS húsi, og sí, við hurðina av templi HARRANS, ímillum forhøllina og altarið, *vóru* umleið fimm og tjúgu menn, við sínum ryggjum ímóti templi HARRANS, og sínum andlitum ímóti eysturi; og teir tilbóðu sólina ímóti eysturi.

17 ¶ Tá segði hann við meg, Hevurt tú sæð *hetta*, O menniskjusonur? Er tað eitt lætt*isligt* ting fyri húsi Judah, at teir fremja tær andstygdir sum teir fremja her? tí at teir hava fylt landið við harðskapi, og hava vent aftur at tirra meg til firtnis: og sí, teir seta greinina til sína nøs.

18 Tí vil eg eisini fara at í øði: mítt eyga skal ikki eira, eiheldur vil eg taka synd í: og tó *at* teir geyli í míni oyru við eini harðari reyst, *tó* vil eg ikki hoyra teir.

KAPITUL 9

HANN geylaði eisini í míni oyru við eini harðari reyst, sigandi, Elv teimum, sum hava álegging yvir staðinum, at koma nær, enntá hvør maður *við* sínum oyðandi vápni í síni hond.

2 Og sí, seks menn komu frá vegi hins hægra porturs, sum liggur ímóti norðan, og hvør maður eitt slátrivápn í síni hond; og ein maður teirra millum *var* klæddur við líni, við blekkhorni hjá einum skrivara við sína lið: og teir fóru inn, og stóðu við síðuna av messing altarinum.

3 Og dýrd Guðs Ísraels var farin upp frá cherubinum, hvaruppiá hann var, til gáttina á húsinum. Og hann kallaði til mannin –

klæddur við líni, sum *hevði* blekkhornið hjá skrivara við sína lið;
4 Og HARRIN segði við hann, Far ígjøgnum miðjan staðin, ígjøgnum miðja Jerusalem, og set eitt merki uppá ennini á monnunum sum suffa og sum rópa fyri allar tær andstygdir sum verði gjørdar í miðjuni harav.
5 ¶ Og til hinar segði hann í míni áhoyrn, Farið tit aftaná honum ígjøgnum staðin, og sláið: latið ikki tykkar eyga spara, eiheldur taki tit synd í:
6 Vegið aldeilis gamlan *og* ungan, bæði moyggjar, og lítil børn, og kvinnur: men komið ikki nær nøkrum manni, uppiá hvørjum *er* merkið; og byrjið við halgidóm mín. Tá byrjaðu teir við teimum elligomlu monnunum sum *vóru* frammanfyri húsið.
7 Og hann segði við teir, Dálkið húsið, og fyllið forgarðarnar við hinum vignu: farið tit fram. Og teir fóru fram, og vógu í staðinum.
8 ¶ Og tað bar á, meðan teir vóru vegandi teir, og eg var eftir, at eg fell uppá mítt andlit, og geylaði, og segði, Á, Harri GUÐ! vilt tú oyða alt hitt eftirverandi av Ísrael í tíni úthelling av tíni øði uppá Jerusalem?
9 Tá segði hann við meg, Misgerðin hjá húsi Ísraels og Judah *er* ovurhonds mikil, og landið er fult av blóði, og staðurin fullur av spillusemi: tí at teir siga, HARRIN hevur yvirgivið jørðina, og HARRIN sær ikki.
10 Og hvat viðvíkur mær eisini, mítt eyga skal ikki eira, eiheldur vil eg taka synd í, *men* eg vil endurgjalda teirra veg omanyvir teirra høvd.
11 Og sí, maðurin, klæddur við líni, sum *hevði* blekkhornið við sína lið, fráboðaði sakina, sigandi, Eg havi gjørt sum tú hevurt áboðið mær.

KAPITUL 10

TÁ hugdi eg, og sí, í hválvinum sum var uppiyvir høvdunum hjá chêr-û-bĭm´-unum birtist yvir teimum sum var tað ein sapphīr steinur, sum útsjóndin á líkleikanum á einum hásæti.
2 Og hann talaði við mannin, klæddan við líni, og segði, Far inn ímillum hjólini, *enntá* undir cherubin, og fyll tína hond við kolum av eldi frá ímillum chêr-û-bĭm´-arnar, og spjað *tey* yvir staðin. Og hann fór inn í eygsjón míni.
3 Nú, chêr-û-bĭm´-arnir stóðu høgrumegin við húsið, tá ið maðurin fór inn; og skýggið fylti hin innara forgarð.
4 Tá fór dýrd HARRANS upp frá cherubinum, *og stóð* yvir gáttini av húsinum; og húsið varð fylt við skýgginum, og forgarðurin varð fullur av bjartleikanum av dýrd HARRANS.
5 Og ljóðið av veingjunum hjá chêr-û-bĭm´-unum varð hoyrt *enntá* til hin uttara forgarð, sum ljóðið av hinum Almáttuga Guði, tá ið hann talar.
6 Og tað bar á, *at* tá ið hann hevði áboðið manninum, klæddum við líni, sigandi, Tak eld frá ímillum hjólini, frá ímillum chêr-û-bĭm´-arnar; tá fór hann inn, og stóð við síðuna av hjólunum.
7 Og *ēin* cherubur strekti fram sína hond frá ímillum chêr-û-bĭm´-arnar at eldinum sum *var* ímillum chêr-û-bĭm´-arnar, og tók *harav*, og koyrdi *tað* inn í hendurnar á *honum sum var* klæddur við líni: hvør tók *tað*, og fór út.
8 ¶ Og tað birtist í chêr-û-bĭm´-unum skapið á manshond undir veingjum teirra.
9 Og tá ið eg hugdi, sí tey fýra hjólini við chêr-û-bĭm´-arnar, ēitt hjól við ēin cherub, og eitt annað hjól við ein annan cherub:

og útsjóndin á hjólunum *var* eins og liturin á einum beryll steini.

10 Og *hvat* teirra útsjóndum *viðvíkur,* teir fýra høvdu ēin líkleika, sum um eitt hjól hevði verið í miðjuni av einum hjóli.

11 Tá ið teir fóru, fóru teir uppiá sínum fýra síðum; teir vendu ikki sum teir fóru, men til tað staðið, hvagar høvdið horvdi, teir fylgdu tí; teir vendu ikki sum teir fóru.

12 Og heila teirra likam, og teirra ryggir, og teirra hendur, og teirra veingir, og hjólini, *vóru* full í eygum runt íkring, *enntá* hjólini sum teir fýra høvdu.

13 Hvat hjólunum viðvíkur, tað varð geylað at teimum í míni hoyrn, O hjól.

14 Og hvør *og* ēin hevði fýra andlit: tað fyrsta andlitið *var* andlitið á einum cherubi, og tað annað andlitið *var* andlitið á einum manni, og tað triðja andlitið á eini leyvu, og tað fjórða andlitið á eini ørn.

15 Og chêr-û-bĭm´-arnir vórðu hevjaðir upp. Henda *er* hin livandi skepna sum eg sá við Chē´-bâr-s ánna.

16 Og tá ið chêr-û-bĭm´-arnir fóru, fóru hjólini við teir: og tá ið chêr-û-bĭm´-arnir lyftu upp sínar veingir at hevja *seg* upp frá jørðini, vendu tey somu hjólini eisini ikki frá *at vera* við síðuna av teimum.

17 Tá ið teir stóðu, stóðu *hesi;* og tá ið teir vórðu lyftir upp, lyftu *hesi* upp seg sjálv *eisini:* tí at andin hjá teimum livandi skepnunum *var* í teimum.

18 Tá fór dýrd HARRANS avstað oman av gáttini á húsinum, og stóð yvir chêr-û-bĭm´-unum.

19 Og chêr-û-bĭm´-arnir lyftu upp sínar veingir, og hevjaðu *seg* upp frá jørðini í míni eygsjón: tá ið teir fóru út, *vóru* hjólini eisini við síðuna av teimum, og *hvør og ēin* stóð við dyrnar av eystur portrinum av húsi HARRANS; og dýrd Guðs Ísraels *var* yvir teimum uppiyvir.

20 Henda *er* hin livandi skepna sum eg sá undir Guði Ísraels við Chē´-bâr-s ánna; og eg vitsti, at tær *vóru* chêr-û-bĭm´-arnir.

21 Hvør *og* ēin hevði fýra andlit stykkið, og hvør *og* ēin fýra veingir; og líkleikin á hondunum á einum manni *var* undir teirra veingjum.

22 Og líkleikin á teirra andlitum *var* hini somu andlitini sum eg sá við Chē´-bâr-s ánna, teirra útsjóndir og teir sjálvir: teir fóru hvør *og* ēin beint frameftir.

KAPITUL 11

HARAFTURAT lyfti andin meg upp, og førdi meg at eystur portri HARRANS húss, sum horvir eystureftir: og sí við dyrnar á portrinum fimm og tjúgu menn; hvørja millum eg sá Já-ă-zăn´-jăh Á´-zûr-s son, og Pĕ-lăt´-jăh Bĕ-nāĭ´-ăh son, prinsar hjá fólkinum.

2 Tá segði hann við meg, Menniskjusonur, hetta *eru* menninir sum upphugsa mein, og geva vont ráð í hesum staði:

3 Sum siga, *Tað er* ikki nær; latum okkum byggja hús˘: hesin *staður er* stórketilin, og vit *veri* kjøtið.

4 ¶ Tessvegna prophetera ímóti teimum, prophetera, O menniskjusonur.

5 Og Andi HARRANS fell uppá meg, og segði við meg, Tala; Svá sigur HARRIN, Svá hava tit sagt, O hús Ísraels: tí at eg kenni tey ting sum koma inn í huga tykkara, *hvørt og ēitt av* teimum.

6 Tit hava margfaldað tykkara vignu í hesum staði, og tit hava fylt gøturnar harav við hinum vignu.

7 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Tykkara vignu, hvørjar tit

hava lagt í miðjuna av honum, teir *eru* kjøtið, og hesin *staður er* stórketilin: men eg vil føra tykkum fram út úr miðjum honum.

8 Tit hava óttast svørðið; og eg vil føra eitt svørð omanyvir tykkum, sigur Harrin GUÐ.

9 Og eg vil føra tykkum út úr miðjuni harav, og flýggja tykkum inn í hendurnar á fremmandum, og vil útinna dómar tykkara millum.

10 Tit skulu falla við̂ svørðinum; eg vil døma tykkum í landamarki Ísraels; og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

11 Hesin *staður* skal ikki vera stórketil tykkara, eiheldur skulu tit vera kjøtið í miðjuni harav; *men* eg vil døma tykkum í landamarki Ísraels:

12 Og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN: tí at tit hava ikki gingið í mínum ásetingum, eiheldur útint mínar dómar, men hava gjørt eftir háttarløgunum hjá teimum heidnu sum *eru* rundan um tykkum.

13 ¶ Og tað bar á, tá ið eg prophēteraði, at Pĕ-lăt´-jăh Bĕ-nāĭ´-ăh sonur doyði. Tá fell eg niður uppá andlit mítt, og geylaði við eini harðari reyst, og segði, Á, Harri GUÐ! vilt tú gera ein fullan enda á leivd Ísraels?

14 Aftur kom orð HARRANS at mær, sigandi,

15 Menniskjusonur, brøður tínir, *enntá* brøður tínir, menninir av ættarfólki tínum, og alt hús Ísraels heil*veg*is, *eru* teir, við hvørjar íbúgvarnir av Jerusalem hava sagt, Sleppið tykkum langt frá HARRANUM: innat okkum er hetta land givið í ogn.

16 Tessvegna sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Hóast eg havi kastað teir langt burtur hinna heidnu millum, og hóast eg havi spjatt teir landanna millum, tó vil eg vera fyri teimum sum ein lítil halgidómur í londunum, har teir skulu koma.

17 Tessvegna sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil enntá savna tykkum frá fólkinum, og fylkja tykkum út úr londunum, har tit hava verðið spjaddir, og eg vil geva tykkum land Ísraels.

18 Og teir skulu koma hagar, og teir skulu taka burt allar hinar andskræmiligu lutir tess og allar andstygdir tess haðani.

19 Og eg vil geva teimum ēitt hjarta, og eg vil koyra ein nýggjan anda innan í tykkum; og eg vil taka tað steinuta hjartað út úr teirra kjøti, og vil geva teimum eitt hjarta av kjøti:

20 At teir mega ganga í mínum ásetingum, og halda mínar regluskipanir, og gera tær: og teir skulu vera fólk mítt, og eg vil vera Guð teirra.

21 Men *hvat viðvíkur teimum,* hvørs hjarta gongur eftir hjarta teirra andskræmiligu luta og teirra andstygdum, eg vil endurgjalda teirra veg omanyvir teirra egnu høvd, sigur Harrin GUÐ.

22 ¶ Tá lyftu chĕr-ū-bĭm´-arnir upp sínar veingir, og hjólini við síðuna av teimum; og dýrd Guðs Ísraels *var* yvir teimum uppiyvir.

23 Og dýrd HARRANS fór upp frá miðjum staðinum, og stóð uppiá fjallinum sum *er* á eystur síðuni av staðinum.

24 ¶ Síðan tók andin meg upp, og førdi meg í eini sjón av Anda Guðs inn í Chăl-dē´-u, til teirra av fangaskapinum. So sjónin, sum eg hevði sæð, fór upp frá mær.

25 Tá talaði eg yvirat teimum av fangaskapinum allar lutirnar sum HARRIN hevði sýnt mær.

KAPITUL 12

ORÐ HARRANS eisini kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, tú býrt í miðjuni av einum uppreistrarsomum

húsi, sum hava eygu at síggja, og síggja ikki; teir hava oyru at hoyra, og hoyra ikki: tí at teir *eru* eitt uppreistrarsamt hús.

3 Tessvegna, tú menniskjusonur, fyribúgv tær ting til burtflytingar, og burtflyt um dag*in* í eygsjón teirra; og tú skalt burtflyta frá tínum plássi til eitt annað pláss í teirra eygsjón: tað kann vera *at* teir vilji umhugsa, tó *at* teir *veri seg* eitt uppreistrarsamt hús.

4 Tá skalt tú bera fram tíni ting um dag*in* í teirra eygsjón, sum ting til burtflytingar: og tú skalt fara fram um aftan í teirra eygsjón, eins og teir sum fara fram inn í fangaskap.

5 Grava tú ígjøgnum múrin í teirra eygsjón, og ber út harhjá.

6 Í teirra eygsjón skalt tú bera *tað* uppiá *tínum* herðum, *og* bera *tað* fram í hálvalýsinum: tú skalt hylja andlit títt, at tú ei síggi lendið: tí at eg havi sett teg *til* eitt tekin at húsi Ísraels.

7 Og eg gjørdi soleiðis sum mær varð ábjóðað: eg førdi fram míni ting um dag*in,* sum ting til fangaskaps, og um aftan gróv eg ígjøgnum múrin við míni hond; eg førdi *tað* fram í hálvalýsinum, *og* eg bar *tað* uppiá *mínum* herðum í eygsjón teirra.

8 ¶ Og um morgunin kom orð HARRANS at mær, sigandi,

9 Menniskjusonur, hevur ikki hús Ísraels, hitt uppreistrarsama hús, sagt við teg, Hvat gert tú?

10 Sig tú við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Hesin byrði *viðvíkur* prinsinum í Jerusalem, og øllum húsi Ísraels sum *eru* teirra millum.

11 Sig, Eg *eri* tekin tykkara: líka sum eg havi gjørt, soleiðis skal tað verða gjørt at teimum: teir skulu burtflyta *og* fara inn í fangaskap.

12 Og prinsurin, sum *er* teirra millum, skal bera uppiá *síni* øksl í hálvalýsinum, og skal fara fram: teir skulu grava ígjøgnum múrin til at bera út harhjá: hann skal hylja andlit sítt, at hann ei síggi lendið við *sínum* eygum.

13 Mítt garn eisini vil eg breiða uppá hann, og hann skal verða tikin í míni snerru: og eg vil føra hann til Bábylon *til* lands Chăldē'anna; tó skal hann ei síggja tað, hóast hann skal doyggja har.

14 Og eg vil spjaða móti hvørjum vindi allar sum *eru* um hann til at hjálpa honum, og øll hansara lið; og eg vil draga út svørðið eftir teimum.

15 Og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg skal spjaða teir tjóðanna millum, og dreiva teir í londunum.

16 Men eg vil eftirlata nakrar fáar menn av teimum frá svørðinum, frá hungursneyðini, og frá drepsóttini; at teir mega kunngera allar sínar andstygdir hinna heidnu millum, hvagar teir koma; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

17 ¶ Harafturat kom orð HARRANS til mín, sigandi,

18 Menniskjusonur, et breyð títt við bivan, og drekk vatn títt við nøtran og við stúranarfullsemi;

19 Og sig við fólk landsins, Svá sigur Harrin GUÐ um íbúgvar Jerusalems, *og* um land Ísraels; Teir skulu eta breyð sítt við stúranarfullsemi, og drekka vatn sítt við øtan, at hennara land má verða oyði frá øllum sum er harí, uppá grund av harðskapinum av øllum teimum sum búgva harí.

20 Og staðirnir, sum eru bygdir, skulu verða lagdir *í* oyði, og landið skal vera avtoftað; og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

21 ¶ Og HARRANS orð kom at mær, sigandi,

22 Menniskjusonur, hvat *er* tað orðtak *sum* tit hava í landi Ísraels, sigandi, Dagarnir eru framlongdir, og hvør *ēin* sjón svitast?

23 Sig teimum tessvegna, Svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil fáa hetta orðtak at halda uppat, og teir skulu ei meira brúka tað sum eitt orðtak í Ísrael; men sig við teir, Dagarnir eru fyri hond, og virknið av hvørjari sjón.

24 Tí at har skal ei meira vera nøkur fáfongd sjón ella smikrandi spásøgn innanfyri Ísraels hús.

25 Tí at eg *eri* HARRIN: eg vil tala; og orðið, sum eg skal tala, skal bera á; tað skal ei meira verða framlongt: tí at á tykkara døgum, O uppreistrarsama hús, vil eg siga orðið, og vil útinna tað, sigur Harrin GUÐ.

26 ¶ Aftur kom orð HARRANS til mín, sigandi,

27 Menniskjusonur, sí, *teir av* Ísraels húsi siga, Sjónin, sum hann sær, *er* til mangar dagar *ið koma skulu,* og hann prophetterar um tíðirnar *sum eru* langt burturi.

28 Tessvegna sig við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Tað skulu eingi av orðunum hjá mær verða framlongd meira, men orðið, sum eg havi talað, skal verða gjørt, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 13

OG HARRANS orð kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, prophetera ímóti prophetum Ísraels sum prophetera, og sig tú við teir sum prophetera út úr egnu hjørtum sínum, Hoyrið tit orð HARRANS;

3 Svá sigur Harrin GUÐ; Vei teimum dársomu prophetunum, sum fylgja sínum egna anda, og hava einkið sæð!

4 O Ísrael, prophetarnir hjá tær eru sum revarnir í oyðimørkunum.

5 Tit hava ikki farið niðan í skørðini, eiheldur laðað upp girðingina til hús Ísraels at standast í bardaganum á degi HARRANS.

6 Teir hava sæð fáfongd og lúgvandi spásøgn, sigandi, HARRIN sigur: og HARRIN hevur ikki sent teir: og teir hava fingið *aðrar* at vóna at teir vildu staðfesta orðið.

7 Hava tit ikki sæð eina fáfongda sjón, og hava tit ikki talað eina lúgvandi spásøgn, eftirsum *at* tit siga, HARRIN sigur *tað;* veri alt *so,* eg havi ikki talað?

8 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tit hava talað fáfongd, og sæð lygnir, tessvegna, sí, eg *eri* ímóti tykkum, sigur Harrin GUÐ.

9 Og mín hond skal vera uppiá prophetunum sum síggja fáfongd, og sum spásiga lygnir: teir skulu ikki vera í savnaði fólks míns, eiheldur skulu teir verða skrivaðir í skrift Ísraels húss, eiheldur skulu teir innfara inn í land Ísraels; og tit skulu vita, at eg *eri* Harrin GUÐ.

10 ¶ Av tí at, enntá av tí at teir hava villleitt fólk mítt, sigandi, Friður, og eingin friður *var;* og ēin bygdi upp ein múr, og sí, aðrir sparslaðu hann við óavstemmaðum *mørtli:*

11 Sig við teir, sum sparsla *hann* við óavstemmaðum *mørtli,* at hann skal falla: har skal verða ein yvirfløðandi skúrur; og tit, O miklu heglsteinar, skulu falla; og ein stormutur vindur skal skræða *hann.*

12 Sí, tá ið múrurin er fallin, skal tað ikki verða sagt við tykkum, Hvar *er* sparslingin, við hvørji tit hava sparslað *hann?*

13 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil enntá skræða *hann* við einum stormutum vindi í míni øði; og har skal verða ein yvirfløðandi skúrur í míni firtni, og miklir heglsteinar í *míni* øði til at upptæra *hann.*

14 So vil eg bróta múrin, sum tit hava sparslað við óavstemmaðum *mørtli,* og føra hann niður til jarðarinnar, so at grundvøllurin harav skal verða avhuldur, og

hann skal falla, og tit skulu verða upptærdir í miðjuni harav: og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

15 Svá vil eg fullføra mína vreiði omanyvir múrin, og omanyvir teir sum hava sparslað hann við óavstemmaðum *mørtli,* og vil siga við tykkum, Múrurin *er* ei *meira,* eiheldur teir sum sparslaðu hann;

16 *Tað vil siga,* prophetar Ísraels sum prophetera viðvíkjandi Jerusalem, og sum síggja friðar sjónir til hennara, og eingin friður *er,* sigur Harrin GUÐ.

17 ¶ Líkaleiðis, tú menniskjusonur, set títt andlit ímóti døtrum fólks tíns, sum prophetera út úr egna hjarta sínum; og prophetera tú ímóti teimum,

18 Og sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Vei til *kvennanna* sum seyma pútur til allar armholur, og gera høvuðturriklæðir uppá høvdið á hvørjari vakstrarhædd til at veiða sálir! Vilja tit veiða sálir fólks míns, og vilja tit frelsa tær sálir á lívi *sum koma* at tykkum?

19 Og vilja tit óreinka meg millum fólks míns fyri krummur av byggi og fyri stykkir av breyði, at vega tær sálir sum skuldu ikki doyggja, og at frelsa tær sálir á lívi sum skuldu ikki liva, viðˆ tykkara lúgving fyri mínum fólki sum hoyra *tykkara* lygnir?

20 Hvørsvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg *eri* ímóti tykkara pútum, hvarvið tit har veiða sálirnar *fyri* at fáa *tær* at flúgva, og eg vil skræða tær frá tykkara ørmum, og vil lata sálirnar fara, *enntá* sálirnar sum tit veiða *fyri* at fáa *tær* at flúgva.

21 Tykkara høvuðturriklæðir eisini vil eg ríva, og útfría mítt fólk út úr hond tykkara, og tey skulu ei meira vera í tykkara hond til at verða veidd; og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

22 Av tí at við lygnum hava tit gjørt hjarta hins rættvísa dapurt, hvønn eg havi ikki gjørt dapran; og styrkt hendur hins vonda, at hann skuldi ikki venda aftur frá sínum vonda vegi, við at lova honum lív:

23 Tí skulu tit ei meira síggja fáfongd, ella spásiga spásagnir: tí at eg vil útfría mítt fólk út úr hond tykkara: og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 14

TÁ komu ávísir av hinum elstu av Ísrael at mær, og sótu frammi fyri mær.

2 Og HARRANS orð kom at mær, sigandi,

3 Menniskjusonur, hesir menn hava sett upp sínar avgudar í sínum hjarta, og sett snávingarsteinin av síni misgerð frammanfyri andlit sítt: skuldi eg verðið fregnaður av yvirhøvur av teimum?

4 Tessvegna tala yvirat teimum, og sig yvirat teimum, Svá sigur Harrin GUÐ; Hvør maður av húsi Ísraels sum setur upp sínar avgudar í sínum hjarta, og setur snávingarsteinin av síni misgerð frammanfyri andlit sítt, og kemur til prophetin; eg, HARRIN, vil svara honum sum kemur samsvarandi við fjøldina av hans avgudum;

5 At eg má taka hús Ísraels í teirra egna hjarta, av tí at teir eru allir fremmandgjørdir frá mær gjøgnum avgudar sínar.

6 ¶ Tessvegna sig við Ísraels hús, Svá sigur Harrin GUÐ; Vendið um, og vendið *tykkum* frá tykkar avgudum; og vendið burt tykkar andlitum frá øllum tykkar andstygdum.

7 Tí at hvør tann av Ísraels húsi, ella av tí fremmanda sum útisitur í Ísrael, sum atskilur seg sjálvan frá mær, og setur upp sínar avgudar í sínum hjarta, og setur snávingarsteinin av síni misgerð frammanfyri andlit sítt, og kemur til ein prophet at fregna av honum

viðvíkjandi mær; eg, HARRIN, vil svara honum fyri meg sjálvan:
8 Og eg vil seta mítt andlit ímóti tí manni, og vil gera hann *til* eitt tekin og eitt orðtak, og eg vil skera hann av frá miðjum fólki mínum; og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.
9 Og um propheturin verði villleiddur tá ið hann hevur talað eitt ting, eg, HARRIN, havi villleitt tann prophet, og eg vil strekkja út mína hond omanyvir hann, og vil oyða hann frá miðjum fólki mínum Ísrael.
10 Og teir skulu bera revsingina av síni misgerð: revsing prophetsins skal vera enntá eins og revsingin hjá honum sum søkir *innat honum;*
11 At Ísraels hús má ei meira fara til stroks frá mær, eiheldur verða óreinkað meira við øllum sínum brotum; men at teir mega vera fólk mítt, og eg má vera Guð teirra, sigur Harrin GUÐ.
12 ¶ HARRANS orð kom aftur til mín, sigandi,
13 Menniskjusonur, tá ið landið syndar ímóti mær við at misbróta herviliga, tá vil eg strekkja út mína hond uppá tað, og vil bróta stavin av breyði tess, og vil senda hungursneyð omanyvir tað, og vil skera av mann og djór frá tí:
14 Hóast hesir tríggir menn, Nóah, Dániel, og Job, vóru í tí, skuldu teir bjargað *bert* sínum egnu sálum við síni rættvísi, sigur Harrin GUÐ.
15 ¶ Um eg elvi herviligum djórum at fara ígjøgnum landið, og tey herji tað, so at tað verði oyði, at eingin maður má fara ígjøgn uppá grund av djórunum:
16 *Hóast* hesir tríggir menn *vóru* í tí, *sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, skulu teir bjarga hvørki sonum ella døtrum; teir einans skulu verða bjargaðir, men landið skal verða oyði.
17 ¶ Ella *um* eg føri eitt svørð omanyvir tað landið, og sigi, Svørð, far ígjøgnum landið; so at eg skeri av mann og djór frá tí:
18 Hóast hesir tríggir menn *vóru* í tí, *sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, teir skulu bjarga hvørki sonum ella døtrum, men teir einans skulu verða bjargaðir sjálvir.
19 ¶ Ella *um* eg sendi eina drepsótt inn í tað landið, og helli út mína øði uppá tað í blóði, at skera av frá tí mann og djór:
20 Hóast Nóah, Dániel, og Job, *vóru* í tí, *sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, teir skulu bjarga hvørki syni ella dóttur; teir skulu *bert* bjarga sínum egnu sálum við síni rættvísi.
21 Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Hvør mikið meira tá ið eg sendi mínar fýra sváru dómar omanyvir Jerusalem, svørðið, og hungursneyðina, og hitt herviliga djórið, og drepsóttina, at skera av frá tí mann og djór?
22 ¶ Tó, sí, harí skal verða eftir ein leivd sum skal verða førd fram, *bæði* synir og døtur: sí, tey skulu koma fram at tykkum, og tit skulu síggja teirra veg og teirra gerðir: og tit skulu verða uggaðir viðvíkjandi tí illa sum eg havi ført omanyvir Jerusalem; *enntá* viðvíkjandi øllum sum eg havi ført omanyvir tað.
23 Og tey skulu ugga tykkum, tá ið tit síggja teirra vegir og teirra gerðir: og tit skulu vita, at eg havi ikki gjørt uttan grund alt sum eg havi gjørt í tí, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 15

OG HARRANS orð kom at mær, sigandi,
2 Menniskjusonur, Hvat er víntræið meir enn nakað træ, *ella enn* ein grein sum er skógartræanna millum?
3 Skal viður verða tikin harav til at gera nakað verk? ella vilja

menn taka ein pinn av tí til at hanga nakað ker hará?

4 Sí, tað verður kastað inn í eldin til brennievni; eldurin upptærir báðar endarnar av tí, og miðjan av tí verður brend. Er tað egnað til *nakað* verk?

5 Sí, tá ið tað var heilt, var tað egnað til einkið verk: hvør mikið minni skal tað vera egnað enn til *nakað* verk, tá ið eldurin hevur upptært tað, og tað er brent?

6 ¶ Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Eins og víntræið skógartræanna millum, sum eg havi givið til eldin til brennievni, soleiðis vil eg geva íbúgvarnar av Jerusalem.

7 Og eg vil seta mítt andlit ímóti teimum; teir skulu fara út frá *ēinum* eldi, og *ein annar* eldur skal upptæra teir; og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg seti mítt andlit ímóti teimum.

8 Og eg vil gera landið oyði, av tí at teir hava framt eitt misbrot, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 16

AFTUR kom HARRANS orð at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, elv Jerusalem at skyna sínar andstygdir,

3 Og sig, Svá sigur Harrin GUÐ við Jerusalem; Tín føðing og tín uppruni *er* úr landi Cānaans; tín faðir *var* ein Amoriti, og tín móðir ein Hittiti.

4 Og *hvat* tínum uppruna *viðvíkur,* á tí degi tú varðst fødd, varð tín nalvi ikki skorin, eiheldur varðst tú tváað í vatni til at bloyta *teg;* tú varðst ikki saltað yvirhøvur, ella reivað yvirhøvur.

5 Einkið eyga tók synd í tær, at gera nøkur av hesum at tær, at hava várkunn uppá teg; men tú varðst kastað út í hin opna akur, til vamlingina við tín persón, á tí degi sum tú varðst fødd.

6 ¶ Og tá ið eg fór framvið tær, og sá teg óreinskaða í tínum egna blóði, segði eg við teg, *tá ið tú vart* í tínum blóði, Liv; ja, eg segði við teg, *tá ið tú vart* í tínum blóði, Liv.

7 Eg havi volt tær at margfaldast sum spíri akursins, og tú hevurt tikið til og *ert* vaksin mikil, og tú ert komin til frábæra prýðisluta: *tíni* bróst eru sniðin, og títt hár er vaksið, hvar ið tú *vart* nakin og ber.

8 Nú, tá ið eg fór framvið tær, og hugdi uppá teg, sí, tíðin hjá tær *var* kærleikstíðin; og eg breiddi mítt skeyti yvir teg, og dekkaði tína nakni: ja, eg svór at tær, og inngekk inn í ein sáttmála við teg, sigur Harrin GUÐ, og tú gjørdirst mín.

9 Tá tváaði eg tær við vatni; ja, eg grundiga tváaði burt títt blóð frá tær, og eg salvaði teg við olju.

10 Eg klæddi teg eisini við skreytaðum verki, og skøddi teg við grevlingaskinni, og eg gyrdi teg umkring við fínum líni, og eg dekkaði teg við silki.

11 Eg dekkaði teg eisini við prýðislutum, og eg koyrdi armringar uppá tínar hendur, og eina ketu á tín háls.

12 Og eg koyrdi ein skartgrip á títt enni, og oyrnaringar í tíni oyru, og eina vakra krúnu uppá títt høvd.

13 Svá varðst tú dekkað við gulli og silvuri; og tín klædnaður *var av* fínum líni, og silki, og skreytaðum verki; tú átst fínt mjøl, og hunang, og olju: og tú vart avbera føgur, og tú framgekst yvirí eitt kongadømi.

14 Og títt navnfremi fór út hinna heidnu millum vegna tín vakurleika: tí at hann *var* fullkomin ígjøgnum mín tekkiligleika, sum eg hevði lagt uppá teg, sigur Harrin GUÐ.

15 ¶ Men tú troystaðirt á tín egna vakurleika, og spældirt

skøkjan uppá grund av navnfremi tíni, og heltirt út tínar leysalevnaðir á hvønn tann sum fór framvið; hansara tað var.

16 Og av tínum klæðum tókst tú, og dekkaðirt tíni høgu pláss við ymsum litum, og spældirt skøkjan haruppiá: *hini líku ting* skulu ikki koma, eiheldur skal tað verða *so*.

17 Tú hevurt eisini tikið tínar føgru skartgripir av mínum gulli og av mínum silvuri, sum eg hevði givið tær, og gjørdirt til tín sjálvs myndir av monnum, og framdirt hordóm við teimum,

18 Og tókst tíni skreytaðu klæðir, og dekkaðirt tær: og tú hevurt sett mína olju og mítt roykilsi frammanfyri teimum.

19 Mín mat eisini sum eg gav tær, fint mjøl, og olju, og hunang, *hvarvið* eg mataði teg, tú hevurt enntá sett hann frammanfyri teimum til ein søtan anga: og *svá* varð tað, sigur Harrin GUÐ.

20 Harafturat hevurt tú tikið synir tínar og døtur tínar, hvørji tú hevurt føtt mær, og hesi hevurt tú sláturofrað at teimum til at verða uppgloypt. *Er hetta* av tínum hordómum ein lítil søk,

21 At tú hevurt vigið míni børn, og flýggjað tey til at volda teimum at fara ígjøgnum *eldin* fyri tær?

22 Og í øllum tínum andstygdum og tínum hordómum hevurt tú ikki minst tínar ungdómsdagar, tá ið tú vart nakin og ber, *og* vart óreinskað í tínum blóði.

23 Og tað bar á aftaná alla vondsku tína, (vei, vei tær! sigur Harrin GUÐ;)

24 *At* tú hevurt eisini bygt tær eitt framúrskarandi pláss, og hevurt gjørt tær eitt høgt pláss í hvørjari gøtu.

25 Tú hevurt bygt títt høga pláss við hvørt mót vegarins, og hevurt fingið tín vakurleika at verða stiknaðan *við*, og hevurt opnað tínar føtur fyri hvørjum tí sum fór framvið, og margfaldað hordómar tínar.

26 Tú hevurt eisini framt siðloysi við Egyptunum — tínum grannum, kjøtmiklum; og hevurt økt um hordómar tínar, at tirra meg til firtnis.

27 Sí, eg havi tessvegna strekt út mína hond yvir teg, og havi minkað um tín vanliga *mat,* og flýggjað teg at viljanum hjá teimum sum hata teg, døtrunum hjá Philistunum, sum skammast um tín skammleysa veg.

28 Tú hevurt spælt skøkjan eisini við Assýriarunum, av tí at tú vart ómettilig; ja, tú hevurt spælt skøkjan við teimum, og tó kundirt ei verða mettað.

29 Tú hevurt harafturat margfaldað títt siðloysi í landi Cānaans at Chăl-dē´-u; og tó varðst tú ikki mettað hervið.

30 Hvør veikt er títt hjarta, sigur Harrin GUÐ, eftirsum *at* tú gert øll hesi *ting,* verkið av eini herskutari, horutari kvinnu;

31 Í at tú byggirt títt frágerðar pláss á mótinum á hvørjum vegi, og gert títt høga pláss í hvørjari gøtu; og hevurt ikki verið sum ein skøkja, í at tú háðart hýru;

32 *Men sum* ein ektakona sum fremur hordóm, *sum* tekur fremmandar ístaðin fyri sín ektamann!

33 Teir geva gávur til allar horur: men tú gevurt gávur tínar til alra alskara tína, og leigaðirt teir, at teir mega koma at tær á hvørjari síðu fyri hordóm tín.

34 Og hitt øvugta er í tær frá *øðrum* kvinnum í hordómum tínum, eftirsum *at* eingin fylgir tær til at fremja hordómar: og í at tú gevurt eitt endurgjald, og einkið endurgjald verður givið at tær, tí ert tú øvugt.

35 ¶ Hvørsvegna, O skøkja, hoyr HARRANS orð:

36 Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tín gravskitinsemi varð helt út, og tín nakni avdekkað ígjøgnum tínar hordómar við elskarum tínum, og við øllum avgudum andstygda tína, og við blóði barna tína, sum tú gavst teimum;

37 Sí, tí vil eg savna allar tínar alskarar, við hvørjum tú hevurt tikið njóting, og allar *teir* sum tú hevurt elskað, við øllum *teimum* ið tú hevurt hatað; eg vil enntá savna teir runt umkring ímóti tær, og vil avdekka tína nakni at teimum, at teir mega síggja alla tína nakni.

38 Og eg vil døma teg, eins og kvinnur sum slíta hjúnaband og úthella blóð verða dømdar; og eg vil geva tær blóð í ovursinni og ástbrelni.

39 Og eg vil eisini geva teg inn í hond teirra, og teir skulu blaka niður títt framúrskarandi pláss, og skulu bróta niður tíni høgu pláss: teir skulu berka teg eisini fyri tíni klæðir, og skulu taka tínar føgru skartgripir, og eftirlata teg nakna og bera.

40 Teir skulu eisini føra niðan ein flokk ímóti tær, og teir skulu steina teg við steinum, og stoyta teg ígjøgn við sínum svørðum.

41 Og teir skulu brenna tíni hús við eldi, og útinna dómar uppá teg í eygsjónini á mongum kvinnum: og eg vil elva tær at gevast frá at spæla skøkjan, og tú eisini skalt geva onga hýru meira.

42 So vil eg fáa mína øði mótvegis tær at hvíla, og mín ástbrelni skal víkja frá tær, og eg vil vera kvirrur, og vil ei meira vera firtin.

43 Av tí at tú hevurt ikki minst dagar ungdóms tíns, men hevurt ergrað meg í øllum hesum *tingum;* sí, tí vil eg eisini endurgjalda tín veg omanyvir *títt* høvd, sigur Harrin GUÐ: og tú skalt ikki fremja hetta skammloysi uppum allar tínar andstygdir.

44 ¶ Sí, hvør tann, sum brúkar orðtøk, skal brúka *hetta* orðtak ímóti tær, sigandi, Eins og móðirin *er, soleiðis er* dóttir hennara.

45 Tú *ert* dóttir móður tínar, sum vamlast við sín ektamann og síni børn; og tú *ert* systirin hjá tínum systrum, sum vamlaðust við sínar ektamenn og síni børn: tykkara móðir *var* ein Hittiti, og tykkara faðir ein Amoriti.

46 Og tín eldra systir *er* Sǎ-mâr´-ĭ-â, hon og hennara døtur sum búgva við tína vinstru hond: og tín yngra systir, sum býr við tína høgru hond, *er* Sodoma og hennara døtur.

47 Tó hevurt tú ikki gingið eftir vegum teirra, ella gjørt eftir andstygdum teirra: men, sum *um tað var* eitt sera lítið *ting, so* varðst tú spilt meir enn tær í øllum vegum tínum.

48 *Sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, Sodoma, systir tín, hevur ikki gjørt, hon ella døtur hennara, sum tú hevurt gjørt, tú og døtur tínar.

49 Sí, henda var misgerðin hjá tíni systur Sodomu, hugmóð, fullsemi av breyði, og ríkiligsemi av yrkisloysi var í henni og í døtrum hennara, eiheldur styrkti hon hondina hjá tí fátæka og tørvandi.

50 Og teir vóru hástórir, og framdu andstygd frammi fyri mær: tessvegna tók eg teir burtur sum eg sá *gott*.

51 Eiheldur hevur Sǎ-mâr´-ĭ-â framt helvt*ina* av tínum syndum; men tú hevurt margfaldað tínar andstygdir meir enn tær, og hevurt rættvísgjørt tínar systrar í øllum tínum andstygdum sum tú hevurt gjørt.

52 Tú eisini, sum hevurt dømt tínar systrar, ber tína egnu skomm fyri tínar syndir, sum tú hevurt framt meiri andstyggiligar enn tær: tær eru meiri rættvísar enn

tú: ja, vert tú fjamskað eisini, og ber tína skomm, í at tú hevurt rættvísgjørt tínar systrar.

53 Tá ið eg skal føra aftur teirra fangaskap, fangaskap Sodomu og hennara døtra, og fangaskap Sămâr´ĭ-ŭ og hennara døtra, tá *vil eg føra aftur* fangaskap fanga tína í miðjum teimum:

54 At tú mást bera tína egnu skomm, og mást fjamskast í øllum sum tú hevurt gjørt, í at tú ert ein uggan at teimum.

55 Tá ið tínar systrar, Sodoma og hennara døtur, skulu venda aftur til teirra fyrru støðu, og Sămâr´ĭ-â og hennara døtur skulu venda aftur til teirra fyrru støðu, tá skulu tú og tínar døtur venda aftur til tykkara fyrru støðu.

56 Tí at tín systir, Sodoma, varð ikki nevnd viðˆ munni tínum á degjnum av tíni hugmóð,

57 Áðrenn tín vondska varð avdúkað, sum á tíðini av *tíni* brigslan av døtrunum hjá Sýriu, og øllum *sum eru* runt umkring hana, døtrum Philistanna, sum vanvirða teg runt umkring.

58 Tú hevurt borið títt skammloysi og tínar andstygdir, sigur HARRIN.

59 Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil enntá fara við tær eins og tú hevurt gjørt, sum hevurt vanvirt eiðin í at bróta sáttmálan.

60 ¶ Hóast hetta, eg vil minnast mín sáttmála við teg í døgum ungdóms tíns, og eg vil stovna tær ein ævigtvarandi sáttmála.

61 Tá skalt tú minnast tínar vegir, og skammast, tá ið tú skalt móttaka tínar systrar, tína eldru og tína yngru: og eg vil geva tær at tær til døtur, men ikki við sáttmála tínum.

62 Og eg vil stovna mín sáttmála við teg; og tú skalt vita, at eg *eri* HARRIN:

63 At tú mást minnast, og fjamskast, og ongantíð opna tín munn meira uppá grund av skomm tíni, tá ið eg eri friðarliggjørdur mótvegis tær fyri alt sum tú hevurt gjørt, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 17

OG HARRANS orð kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, set fram eina gátu, og tala eina dømisøgu yvirat Ísraels húsi;

3 Og sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Ein mikil ørn við miklum veingjum, langveingjað, full í fjaðrum, sum hevði ymsar litir, kom at Lĭ-bă-nŏn og tók hina hægstu grein sedris*træsins:*

4 Hon klipti av toppin av tess ungu greinum, og bar tað inn í eitt land av handlan; hon setti tað í ein handilsmanna stað.

5 Hon tók eisini av sáði landsins, og plantaði tað í ein fruktagóðan akur; hon staðsetti *tað* hjá miklum vøtnum, *og* setti tað *sum* eitt pílatræ.

6 Og tað vaks, og gjørdist eitt breiðandi víntræ av lágum vøkstri, hvørs greinar vendu mótvegis tí, og tess røtur vóru undir tí: so tað gjørdist eitt víntræ, og bar fram greinar, og skeyt fram gróðurkvistar.

7 Har var eisini ein onnur mikil ørn við miklum veingjum og mongum fjaðrum: og sí, hetta víntræ bendi sínar røtur mótvegis henni, og skeyt fram sínar greinar mótvegis henni, at hon mátti vatna tað hjá foyrunum av hennara plantan.

8 Tað var plantað í eini góðari mold við mikil vøtn, at tað mátti bera fram greinar, og at tað mátti bera ávøkst, at tað mátti verða eitt frálíkt víntræ.

9 Sig tú, Svá sigur Harrin GUÐ; Skal tað framganga? skal hann ikki hála upp røtur tess, og skera av ávøkst tess, at tað følni? tað skal følna í øllum bløðunum av

síni spretting, enntá uttan mikla kraft, ella mong fólk, at slíta tað upp við rótum tess.

10 Ja, sí, *verandi* plantað, skal tað framganga? skal tað ikki fullkomiliga følna, tá ið eystanvindurin nemur við tað? tað skal følna í foyrunum har tað vaks.

11 ¶ Harafturat kom HARRANS orð at mær, sigandi,

12 Sig nú til hins uppreistrarsama húss, Vita tit ikki hvat hesi *ting merkja?* sig *teimum*, Sí, kongurin av Bábylon er komin til Jerusalem, og hevur tikið kong tess, og prinsar tess, og leitt teir við sær til Bábylon;

13 Og hevur tikið av sáði kongsins, og gjørt ein sáttmála við hann, og hevur tikið ein eið av honum: hann hevur eisini tikið hinar mektigu landsins:

14 At kongadømið mátti verða niðarligt, at tað mátti ikki lyfta seg sjálvt upp, *men* at við halding av hansara sáttmála tað mátti standa.

15 Men hann gjørdi uppreist ímóti honum í at senda sínar umboðsmenn inn í Egyptaland, at teir máttu geva honum hestar og nógv fólk. Skal hann framganga? skal hann komast undan sum ger slíkar *lutir?* ella skal hann bróta sáttmálan, og verða bjargaður?

16 *Sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, vissuliga, í tí plássi *har* kongurin *býr* sum gjørdi hann *til* kong, hvørs eið hann vanvirdi, og hvørs sáttmála hann breyt, *enntá* við honum í miðjari Bábylon skal hann doyggja.

17 Eiheldur skal Pharaoh við *sínum* mektiga heri og mikla flokki dugna honum í krígnum, við at laða upp virkisgarðar, og at byggja festningar, til at skera av mangar persónar:

18 Eftirsum *at* hann vanvirdi eiðin við at bróta sáttmálan, tá ið, sí, hann hevði givið sína hond, og hevur gjørt øll hesi *ting,* skal hann ei komast undan.

19 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; *Sum* eg livi, vissuliga, mín eið sum hann hevur vanvirt, og mín sáttmála sum hann hevur brotið, enntá tað vil eg endurgjalda uppá hans egna høvd.

20 Og eg vil breiða mítt garn uppá hann, og hann skal verða tikin í míni snerru, og eg vil føra hann til Bábylon, og vil føra søk við hann har fyri hansara misbrot sum hann hevur misbrotist ímóti mær.

21 Og allir hansara flóttamenn við øllum hansara *hermanna*liðum skulu falla við svørðinum; og teir sum eru eftir skulu verða spjaddir móti øllum vindum: og tit skulu vita, at eg HARRIN havi talað *tað*.

22 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil eisini taka av hini hægstu grein av hinum høga sedris*træi,* og vil seta *tað;* eg vil klippa av frá toppinum av hans ungu kvistum ein viðbreknan ēin, og vil planta *hann* uppiá einum høgum fjalli og avbærsligum:

23 Á fjalli Ísraels hæddar vil eg planta hann: og hann skal bera fram bular, og bera ávøkst, og vera eitt frálíkt sedris*træ:* og undir tí skal búgva allur fuglur av hvørjum vongi; í skugganum av greinunum harav skulu teir búgva.

24 Og øll trø akursins skulu vita, at eg HARRIN havi ført niður hitt høga træ, havi hevjað hitt lága træ, havi turkað upp hitt grøna træ, og havi fingið hitt turra træ at blómka: eg HARRIN havi talað og havi gjørt *tað*.

KAPITUL 18

ORÐ HARRANS kom at mær aftur, sigandi,

2 Hvat meina tit, at tit brúka hetta orðtak viðvíkjandi landi Ísraels, sigandi, Fedrarnir hava etið

súrar víndrúvur, og tenninar hjá børnunum eru fingnar at tirra?

3 *Sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, tit skulu ikki hava *høvi* meira at brúka hetta orðtak í Ísrael.

4 Sí, allar sálir eru mínar; eins og sálin hjá faðirinum, soleiðis eisini sálin hjá syninum er mín: tann sál, sum syndar, hon skal doyggja.

5 ¶ Men um ein maður veri *seg* rættlátur, og geri tað sum er lógligt og rætt,

6 *Og* hevur ikki etið uppiá fjøllunum, eiheldur hevur hevjað upp eygum sínum til avguda Ísraels húss, eiheldur hevur dálkað ektakonu næsta síns, eiheldur hevur komið nær til eina mánasjúkusama kvinnu,

7 Og hevur ikki kúgað nakran, *men* hevur endurbøtt til skuldnaran veðhald sítt, hevur ongan rænt við^ harðskapi, hevur givið sítt breyð til hin svanga, og hevur dekkað hin nakna við einum klæði;

8 Hann *sum* hevur ikki givið út uppá fæleigu, eiheldur hevur tikið nakran vøkstur, *sum* hevur aftrað sína hond frá misgerð, hevur útint sannan dóm ímillum mann og mann,

9 Hevur gingið í mínum ásetingum, og hevur hildið mínar dómar, at handla sannliga; hann *er* rættlátur, hann skal vissuliga liva, sigur Harrin GUÐ.

10 ¶ Um hann giti ein son *sum er* ein ránsmaður, ein úthellari av blóði, og *sum* ger álíka við *nakran* av hesum *lutum,*

11 Og sum ger ikki nakra av hasum *skyldum,* men enntá hevur etið uppiá fjøllunum, og dálkað ektakonu næsta síns,

12 Hevur kúgað hin fátæka og tørvandi, hevur rænt við harðskapi, hevur ikki veitt aftur veðhaldið, og hevur lyft upp sínum eygum til avgudanna, hevur framt andstygd,

13 Hevur givið út uppá fæleigu, og hevur tikið vøkstur: skal hann tá liva? hann skal ikki liva: hann hevur gjørt allar hesar andstygdir; hann skal vissuliga doyggja; hans blóð skal vera uppiá honum.

14 ¶ Nú, sí, *um* hann giti ein son, sum sær allar syndirnar hjá faðir sínum sum hann hevur gjørt, og umhugsar, og ger ikki tílíkt,

15 *Sum* hevur ikki etið uppiá fjøllunum, eiheldur hevur lyft upp sínum eygum til avguda Ísraels húss, hevur ikki dálkað ektakonu næsta síns,

16 Eiheldur hevur kúgað nakran, hevur ikki afturhildið veðhaldið, eiheldur hevur rænt við harðskapi, *men* hevur givið sítt breyð til hin svanga, og hevur dekkað hin nakna við einum klæði,

17 *Sum* hevur tikið av sína hond frá tí fátæka, *sum* hevur ikki tikið við fæleigu ella vøkstri, hevur útint dómar mínar, hevur gingið í mínum ásetingum; hann skal ikki doyggja fyri misgerðina hjá faðir sínum, hann skal vissuliga liva.

18 *Hvat* hansara faðir *viðvíkur,* av tí at hann grimmligani kúgaði, rændi sín bróður við harðskapi, og gjørdi *tað* sum *er* ikki gott millum fólks síns, sí, enntá hann skal doyggja í síni misgerð.

19 ¶ Tó siga tit, Hví? ber ikki sonurin misgerðina hjá faðirinum? Tá ið sonurin hevur gjørt tað sum er lógligt og rætt, *og* hevur hildið allar mínar ásetingar, og hevur gjørt tær, hann skal vissuliga liva.

20 Tann sál, sum syndar, hon skal doyggja. Sonurin skal ikki bera misgerðina hjá faðirinum, eiheldur skal faðirin bera misgerðina hjá syninum: rættvísin hjá tí rættvísa skal vera uppiá honum, og vondskan hjá tí vonda skal vera uppiá honum.

21 Men um hin vondi vil venda frá øllum sínum syndum sum

hann hevur framt, og halda allar mínar ásetingar, og gera tað sum er lógligt og rætt, hann skal vissuliga liva, hann skal ikki doyggja.
22 Øll hansara misbrot, sum hann hevur framt, tey skulu ikki verða nevnd at honum: í hansara rættvísi, sum hann hevur gjørt, skal hann liva.
23 Havi eg nakra fragd yvirhøvur, at hin vondi skuldi doyð? sigur Harrin GUÐ: *og* ikki at hann skuldi venda aftur frá sínum vegum, og liva?
24 ¶ Men tá ið hin rættvísi vendir burt frá síni rættvísi, og fremur misgerð, *og* ger samsvarandi við allar tær andstygdir sum hin vondi *maður* ger, skal hann liva? Øll hansara rættvísi, sum hann hevur gjørt, skal ikki verða nevnd: í sínum misbroti, sum hann hevur misbrotið, og í síni synd, sum hann hevur syndað, í teimum skal hann doyggja.
25 ¶ Tó siga tit, Vegur Harrans er ikki rættur. Hoyrið nú, O Ísraels hús; Er ikki vegur mín rættur? eru ikki tykkara vegir órættir?
26 Tá ið ein rættvísur *maður* vendir burt frá síni rættvísi, og fremur misgerð, og doyr í teimum; fyri sína misgerð, sum hann hevur gjørt, skal hann doyggja.
27 *Upp*aftur, tá ið hin vondi *maður* vendir burt frá síni vondsku sum hann hevur framt, og ger tað sum er lógligt og rætt, hann skal frelsa sína sál á lívi.
28 Av tí at hann umhugsar, og vendir burt frá øllum sínum misbrotum sum hann hevur framt, skal hann vissuliga liva, hann skal ikki doyggja.
29 Tó sigur Ísraels hús, Vegur Harrans er ikki rættur. O Ísraels hús, eru ikki vegir mínir rættir? eru ikki tykkara vegir órættir?
30 Tí vil eg døma tykkum, O Ísraels hús, hvønn *og* ēin samsvarandi við hansara vegir, sigur Harrin GUÐ. Vendið um, og vendið *tykkum* frá øllum tykkara misbrotum; so *at* misgerð skal ikki verða tykkar oyðing.
31 ¶ Kastið burtur frá tykkum øll tykkara misbrot, hvarviðˆ tit hava misbrotist; og gerið tykkum eitt nýtt hjarta og ein nýggjan anda: tí at hví vilja tit doyggja, O Ísraels hús?
32 Tí at eg havi onga fragd í deyðanum hjá honum sum doyr, sigur Harrin GUÐ: hvørsvegna vendið *tykkum,* og livið tit.

KAPITUL 19

HARAFTURAT, tak tú upp eitt harmljóð yvir prinsar Ísraels,
2 Og sig, Hvat *er* móðir tín? Ein leyvinna: hon legðist niður leyvna millum, hon fostraði sínar hvølpar millum ungra leyvna.
3 Og hon ól upp ēin av hvølpum sínum: hann gjørdist ein ung leyva, og hann lærdi at fanga bráðina; hann uppslúkaði menn.
4 Tjóðirnar eisini hoyrdu um hann; hann varð tikin í teirra holu, og teir førdu hann við ketum til Egyptalands.
5 Nú, tá ið hon sá at hon hevði bíðað, *og* hennara vón var mist, tá tók hon ein annan av hvølpum sínum, *og* gjørdi hann *til* eina unga leyvu.
6 Og hann fór niðan og oman millum leyvnanna, hann gjørdist ein ung leyva, og lærdi at fanga bráðina, *og* uppslúkaði menn.
7 Og hann kendi teirra oydnu slott, og hann legði *í* oyði teirra staðir; og landið varð oyði, og fylling tess, við ljóðið av ýling hans.
8 Tá settu tjóðirnar ímóti honum á hvørjari síðu frá fylkjunum, og breiddu sítt garn yvir hann: hann varð tikin í teirra holu.
9 Og teir settu hann í varðhald í ketum, og førdu hann til kongin

av Bábylon: teir førdu hann inn í varðhøld, at hansara rødd skuldi ei meira verða hoyrd uppiá fjøllum Ísraels.

10 ¶ Tín móðir *er* líka *sum* eitt víntræ í blóði tínum, plantað við vøtnini: hon var ávakstamikil og full av greinum orsakað av mongum vøtnum.

11 Og hon hevði sterk rør til veldissprotarnar hjá teimum sum sótu við stjórn, og hennara vakstrarhædd var upphevjað millum hinna tjúkku greina, og hon birtist í síni hædd við fjøldini av sínum greinum.

12 Men hon varð slitin upp í øði, hon varð kastað niður til jørðina, og eystanvindurin turkaði upp hennar ávøkst: hennara sterku rør vórðu brotin og følnaðu; eldurin upptærdi tey.

13 Og nú *er* hon plantað í oyðuni, í einum turrum og tyrstum lendi.

14 Og eldur er farin út úr einum røri av hennara greinum, *sum* hevur uppetið hennar ávøkst, so at hon hevur einkið sterkt rør *til at vera* ein veldissproti til at stjórna. Hetta *er* eitt harmljóð, og skal vera fyri eitt harmljóð.

KAPITUL 20

OG tað bar á í tí sjeynda árinum, í hinum fimta *mánaði,* tí tíggjunda *deginum* av mánaðinum, *at* ávísir av hinum elstu av Ísrael komu at fregna av HARRANUM, og sótu frammi fyri mær.

2 Tá kom orð HARRANS at mær, sigandi,

3 Menniskjusonur, tala yvirat hinum elstu av Ísrael, og sig við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Eru tit komnir at fregna av mær? *Sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, eg vil ikki verða fregnaður av av tykkum.

4 Vilt tú døma teir, menniskjusonur, vilt tú døma *teir?* fá teir at skyna andstygdirnar hjá sínum fedrum:

5 ¶ Og sig við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Á tí degi tá ið eg valdi Ísrael, og lyfti upp mína hond at sáðinum av Jákobs húsi, og gjørdi meg sjálvan kunnan at teimum í Egyptalandi, tá ið eg lyfti upp mína hond at teimum, sigandi, Eg *eri* HARRIN Guð tykkara;

6 Á tí degi *sum* eg lyfti teimum upp mína hond, at føra teir fram út úr Egyptalandi inn í eitt land sum eg hevði slotað *upp* til teirra, fløðandi við mjólk og hunangi, sum *er* dýrdin av øllum londum:

7 Tá segði eg við teir, Kastið tit burtur hvør maður andstygdir eygna sína, og dálkið ikki tykkum sjálvar við avgudum Egyptalands: eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

8 Men teir gjørdu uppreist ímóti mær, og vildu ikki lýða á meg: teir kastaðu ikki burtur hvør maður andstygdir eygna sína, eiheldur yvirgóvu teir avgudar Egyptalands: tá segði eg, Eg vil hella út mína øði uppá teir, at fullføra mína firtni ímóti teimum í miðjum Egyptalandi.

9 Men eg virkaði fyri navns míns skuld, at tað skuldi ei verðið óreinkað frammi fyri hinum heidnu, hvørja millum teir *vóru,* í hvørs eygsjón eg gjørdi meg sjálvan kunnan at teimum, í at føra teir fram út úr Egyptalandi.

10 ¶ Hvørsvegna eg voldi teimum at fara fram út úr Egyptalandi, og førdi teir inn í oyðuna.

11 Og eg gav teimum mínar ásetingar, og sýndi teimum mínar dómar, hvørji, *um* ein maður geri, hann skal enntá liva í teim.

12 Harafturat eisini gav eg teimum mínar sabbatar, at vera eitt tekin ímillum meg og teir, at teir máttu vita, at eg *eri* HARRIN sum halgi teir.

13 Men Ísraels hús gjørdi

uppreist ímóti mær í oyðuni: teir gingu ikki í mínum ásetingum, og teir vanvirdu mínar dómar, hvørji, *um* ein maður geri, hann skal enntá liva í teim; og mínar sabbatar teir stórliga óreinkaðu: tá segði eg, Eg vil hella út mína øði uppá teir í oyðuni, til at upptæra teir.

14 Men eg virkaði fyri navns míns skuld, at tað skuldi ei verðið óreinkað frammi fyri hinum heidnu, í hvørs eygsjón eg førdi teir út.

15 Tó eisini lyfti eg upp mína hond at teimum í oyðuni, at eg vildi ikki føra teir inn í landið sum eg hevði givið *teimum,* fløðandi við mjólk og hunangi, sum *er* dýrdin av øllum londum;

16 Av tí at teir vanvirdu mínar dómar, og gingu ikki í mínum ásetingum, men óreinkaðu mínar sabbatar: tí at teirra hjarta fór eftir teirra avgudum.

17 Hóast hetta, mítt eyga spardi teir frá at oyða teir, eiheldur gjørdi eg enda á teimum í oyðuni.

18 Men eg segði við teirra børn í oyðuni, Gangið tit ikki í ásetingum fedra tykkara, eiheldur gevið ans eftir teirra dómum, ella dálkið tykkum sjálvar við teirra avgudum:

19 Eg *eri* HARRIN Guð tykkara; gangið í mínum ásetingum, og haldið mínar dómar, og gerið tey;

20 Og halgið mínar sabbatar; og teir skulu vera eitt tekin ímillum meg og tykkum, at tit mega vita, at eg *eri* HARRIN Guð tykkara.

21 Hvussu enn er, børnini gjørdu uppreist ímóti mær: teir gingu ikki í mínum ásetingum, eiheldur hildu mínar dómar at gera tey, hvørji, *um* ein maður geri, hann skal enntá liva í teim; teir óreinkaðu mínar sabbatar: tá segði eg, Eg vildi hella út mína øði uppá teir, til at fullføra mína firtni ímóti teimum í oyðuni.

22 Hóast hetta, eg aftraði mína hond, og virkaði fyri navns míns skuld, at tað skuldi ei verðið óreinkað í eygsjón hinna heidnu, í hvørs eygsjón eg førdi teir út.

23 Eg lyfti upp mína hond at teimum eisini í oyðuni, at eg vildi spjaða teir millum hinna heidnu, og dreiva teir ígjøgnum londini;

24 Av tí at teir høvdu ikki útint mínar dómar, men høvdu vanvirt mínar ásetingar, og høvdu óreinkað mínar sabbatar, og teirra eygu vóru eftir avgudum fedra sína.

25 Hvørsvegna eg gav teimum eisini ásetingar *sum vóru* ikki góðar; og dómar, við hvørjum teir skuldu ikki liva;

26 Og eg óreinkaði teir í teirra egnu gávum, í at teir voldu at fara ígjøgnum *eldin* alt sum opnar móðurlívið, at eg mátti gera teir oydnar, til tess endamáls at teir máttu vita, at eg *eri* HARRIN.

27 ¶ Tessvegna, menniskjusonur, tala yvirat Ísraels húsi, og sig við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Enn í hesum hava tykkara fedrar Guðsspottað meg, í at teir hava framt eitt misbrot ímóti mær.

28 *Tí at* tá ið eg hevði ført teir inn í landið, *fyri* hvørt eg lyfti upp mína hond at geva tað til teirra, tá sóu teir hvønn grønan heyggj, og øll hini tjúkku trø, og teir ofraðu har síni sláturoffur, og har teir framsettu tirringina av sínum ofri: har eisini gjørdu teir sín søta anga, og heltu út har síni drykkoffur.

29 Tá segði eg við teir, Hvat *er* tað høga plássið, hvarat tit fara? Og navnið hará er kallað Bá-mäh at hesum degi.

30 Hvørsvegna sig yvirat Ísraels húsi, Svá sigur Harrin GUÐ; Eru tit óreinkaðir eftir háttarlagi fedra tykkara? og fremja tit hordóm eftir andstygdum teirra?

31 Tí at tá ið tit ofra tykkara gáv-

ur, tá ið tit fáa tykkara synir at fara ígjøgnum eldin, óreinka tit tykkum sjálvar við øllum tykkar avgudum, alt at hesum degi: og skal eg verða fregnaður av av tykkum, O Ísraels hús? *Sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, eg vil ikki verða fregnaður av av tykkum.

32 Og tað, sum kemur inn í tykkar huga, skal ikki verða yvirhøvur, at tit siga, Vit vilja vera sum hinir heidnu, sum familjur landanna, at tæna viði og steini.

33 ¶ *Sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, vissuliga við eini mektigari hond, og við einum útrættum armi, og við útheltari øði, vil eg stjórna yvir tykkum:

34 Og eg vil føra tykkum út frá fólkinum, og vil savna tykkum út úr londunum, í hvørjum tit eru spjaddir, við eini mektigari hond, og við einum útrættum armi, og við útheltari øði.

35 Og eg vil føra tykkum inn í fólksins oyðu, og har vil eg føra søk við tykkum andlit til andlits.

36 Líka sum eg førdi søk við tykkara fedrar í Egyptalands oyðu, soleiðis vil eg føra søk við tykkum, sigur Harrin GUÐ.

37 Og eg vil elva tykkum at fara undir stavin, og eg vil føra tykkum inn í band sáttmálans:

38 Og eg vil reinska út tykkara millum ífrá uppreistrar*menn*inar; og teir sum misbróta ímóti mær: eg vil føra teir fram út úr landinum har teir útisita, og teir skulu ikki innfara inn í land Ísraels: og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

39 Hvat tykkum viðvíkur, O Ísraels hús, svá sigur Harrin GUÐ; Farið tit, tænið tit hvør *og* ēin avgudum sínum, og hereftir *eisini,* um tit vilji ikki lýða á meg: men óreinkið tit mítt heilaga navn ei meira við tykkara gávum, og við tykkar avgudum.

40 Tí at á mínum heilaga fjalli, á fjalli Ísraels hæddar, sigur Harrin GUÐ, har skal alt Ísraels hús, allir av teimum í landinum, tæna mær: har vil eg taka ímóti teimum, og har vil eg krevja tykkar offur˘, og frumávøkstirnar av tykkara tilbiðjanar-ofrum, við øllum tykkara heilagu tingum.

41 Eg vil taka ímóti tykkum við tykkara søta anga, tá ið eg føri tykkum út frá fólkinum, og savni tykkum út úr londunum, í hvørjum tit hava verið spjaddir; og eg vil verða halgaður í tykkum frammi fyri hinum heidnu.

42 Og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg skal føra tykkum inn í land Ísraels; inn í landið, *fyri* hvørt eg lyfti upp mína hond at geva tað til tykkara fedrar.

43 Og har skulu tit minnast tykkara vegir; og allar tykkara gerningar, í hvørjum tit hava verðið dálkaðir; og tit skulu vamlast við tykkum sjálvar í tykkar egnu eygsjón fyri øll tykkar illindir sum tit hava framt.

44 Og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg havi virkað við tykkum fyri navns míns skuld, ikki samsvarandi við tykkara vondu vegir, ella samsvarandi við tykkara spiltu gerningar, O tit Ísraels hús, sigur Harrin GUÐ.

45 ¶ Harafturat kom HARRANS orð at mær, sigandi,

46 Menniskjusonur, set títt andlit ímóti suðuri, og slepp *tínum orði* ímóti suðuri, og prophetera ímóti skógi suður akursins;

47 Og sig til suður skógarins, Hoyr HARRANS orð; Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil kynda ein eld í tær, og hann skal upptæra hvørt grønt træ í tær, og hvørt turt træ: hin logandi flamma skal ikki verða sløkt, og øll andlit frá sunnan til norðan skulu verða brend harí.

48 Og alt kjøt skal sjá, at eg HARRIN havi kynt hann: hann skal ikki verða sløktur.

49 Tá segði eg, Á, Harri GUÐ! teir siga um meg, Talar hann ikki dømisøgur?

KAPITUL 21

OG HARRANS orð kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, set títt andlit móti Jerusalem, og slepp *tínum orði* móti teimum heilagu plássunum, og prophetera ímóti landi Ísraels,

3 Og sig til Ísraels lands, Svá sigur HARRIN; Sí, eg *eri* ímóti tær, og vil draga fram svørð mítt út úr slíðra hans, og vil skera av frá tær hin rættvísa og hin vonda.

4 Eftirsum tá at eg vil skera av frá tær hin rættvísa og hin vonda, tí skal svørð mítt fara fram út úr slíðra hans ímóti øllum kjøti frá sunnan til norðan:

5 At alt kjøt má vita, at eg HARRIN havi drigið fram svørð mítt út úr slíðra hans: tað skal ikki venda aftur meira.

6 Suffa tí, tú menniskjusonur, við brótingini av *tínum* lendum; og við beiskleika suffa frammi fyri eygum teirra.

7 Og tað skal verða, tá ið teir siga við teg, Hvørsvegna suffart tú? at tú skalt svara, Fyri tíðindini; av tí at tað kemur: og hvørt hjarta skal bráðna, og allar hendur skulu verða máttleysar, og hvør andi skal ørmaktast, og øll knø skulu verða veik *sum* vatn: sí, tað kemur, og skal verða fingið til at bera á, sigur Harrin GUÐ.

8 ¶ Aftur kom orð HARRANS at mær, sigandi,

9 Menniskjusonur, prophetera, og sig, Svá sigur HARRIN; Sig, Eitt svørð, eitt svørð er hvest, og eisini blankað:

10 Tað er hvest til at gera eina svára slátran; tað er blankað, at tað má glitra: skuldu vit tá hildið at gamni? tað vanvirðir stavin hjá syni mínum, *eins og* hvørt træ.

11 Og hann hevur givið tað til at verða blankað, at tað má verða handfarið: hetta svørðið er hvest, og tað er blankað, til at geva tað inn í hondina á banaranum.

12 Geyla og ýl, menniskjusonur: tí at tað skal vera uppiá fólki mínum, tað *skal vera* uppiá øllum prinsum Ísraels: ræðslur uppá grund av svørðinum skulu vera uppiá fólki mínum: tessvegna slá uppá *títt* lær.

13 Av tí at *tað er* ein roynd, og hvat um *svørðið* vanvirði enntá stavin? tað skal ei *meira* vera, sigur Harrin GUÐ.

14 Tú, tessvegna, menniskjusonur, prophetera, og slá *tínar* hendur saman, og lat svørðið verða tvífaldað triðju ferðina, svørð hinna vignu: tað *er* svørð hinna miklu *manna sum eru* vignir, sum innfer inn í teirra loyniligu kømur.

15 Eg havi sett spískin á svørðinum ímóti øllum teirra portrum, at *teirra* hjarta má ørmaktast, og *teirra* oyður verða margfaldaðar: á! *tað er* gjørt bjart, *tað er* ballað inn til slátringina.

16 Gakk tær ēin veg ella annan, *annaðhvørt* við hina høgru hond, *ella* við hina vinstru, hvagarsumhelst títt andlit *er* sett.

17 Eg vil eisini slá mínar hendur saman, og eg vil elva míni øði at hvíla: eg HARRIN havi sagt *tað*.

18 ¶ HARRANS orð kom at mær aftur, sigandi,

19 Eisini, tú menniskjusonur, útnevn tær tveir vegir, at svørðið hjá konginum av Bábylon má koma: báðir tveir skulu koma fram út úr ēinum landi: og vel tú eitt pláss, vel *tað* við vegarmótið til staðarins.

20 Útnevn ein veg, at svørðið má koma til Răb′-băth Ammonitanna, og til Judah í Jerusalem hitt varda.

21 Tí at kongurin av Bábylon stóð við sundurgreiningina av

veginum, við mótið á teimum tveimum vegunum, til at brúka spásøgn: hann gjørdi *sínar* ørvar bjartar, hann ráðførdi *seg* við myndir, hann hugdi í livrina.

22 Við hans høgru hond var spásøgnin fyri Jerusalem, at útnevna høvuðsmenn, at opna munnin í slátringini, at lyfta upp røddina við rópan, at áseta rambukkar ímóti portrunum, at laða ein virkisgarð, *og* at byggja ein festning.

23 Og tað skal verða at teimum sum ein følsk spásøgn í teirra eygsjón, fyri teimum sum hava svorið eiðir: men hann vil kalla til minnis misgerðina, at teir mega verða tiknir.

24 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tit hava fingið tykkara misgerð at verða minta, í at tykkara brot eru avdúkaði; so at í øllum tykkara gerningum, tykkara syndir sýnast; av tí, *sigi eg,* at tit eru komnir til minnis, skulu tit verða tiknir við hondini.

25 ¶ Og tú, halgispottiligi, vondi prinsur Ísraels, hvørs dagur er komin, tá ið misgerð *skal fáa* ein enda,

26 Svá sigur Harrin GUÐ; Takið burt ennisprýðið, og takið av krúnuna: hesin *skal* ei *vera* hin sami: upphevjið *hann sum er* lágur, og lækkið *hann sum er* høgur.

27 Eg vil kollrenna, kollrenna, kollrenna, tað: og tað skal ei *meira* vera, inntil hann komi, hvørs rættur tað er; og eg vil geva tað *honum*.

28 ¶ Og tú, menniskjusonur, prophetera og sig, Svá sigur Harrin GUÐ viðvíkjandi Ammonitunum, og viðvíkjandi teirra skemd; enntá sig tú, Svørðið, svørðið *er* drigið: til slátringina *er tað* blankað, til at upptæra uppá grund av glitringini:

29 Meðan teir síggja fáfongd at tær, meðan teir spáa eina lygn at tær, at føra teg uppá hálsarnar á *teimum sum eru* vignir, á hinum vondu, hvørs dagur er komin, tá ið teirra misgerð *skal fáa* ein enda.

30 Skal eg elva *tí* at venda aftur inn í slíðra hans? eg vil døma teg í tí plássi har tú varðst skaptur, í landi uppruna tíns.

31 Og eg vil hella út mína harmavreiði uppá teg, eg vil blása ímóti tær í eldinum av míni vreiði, og flýggja teg inn í hondina á óskynskum monnum, *og* hegnigum at oyða.

32 Tú skalt vera til brennievni hjá eldinum; títt blóð skal vera í miðjum landinum; tú skalt ikki *meira* verða mintur: tí at eg HARRIN havi talað *tað*.

KAPITUL 22

HARAFTURAT kom orð HARRANS at mær, sigandi,

2 Nú, tú menniskjusonur, vilt tú døma, vilt tú døma hin blóðiga stað? ja, tú skalt sýna henni allar hennar andstygdir.

3 Tá sig tú, Svá sigur Harrin GUÐ, Staðurin úthellir blóð í miðjum sær, at hennara tíð má koma, og ger avgudar ímóti sær sjálvari til at dálka seg sjálva.

4 Tú ert vorðin skyldig í tínum blóði sum tú hevurt úthelt; og hevurt dálkað teg sjálva í tínum skurðgudum sum tú hevurt gjørt; og tú hevurt volt tínum døgum at dragast nær, og ert komin *enntá* at árum tínum: tí havi eg gjørt teg *til* eina skemd yvirfyri hinum heidnu, og eina háðing fyri øllum londum.

5 *Teir sum veri* nær, og *teir sum veri* fjart frá tær, skulu háða teg, *sum ert* illa gitin *og* nógv nívd.

6 Sí, prinsarnir av Ísrael, hvør *og* ēin vóru í tær til sína makt at úthella blóð.

7 Í tær hava teir mett lætt*isligani* um faðir og móður: í miðjari tær hava teir farið at við kúgan við

hin fremmanda: í tær hava teir nívt hin faðirleysa og einkjuna.
8 Tú hevurt vanvirt míni heilagu ting, og hevurt halgispottað mínar sabbatar.
9 Í tær eru menn sum bera søgur til at úthella blóð: og í tær teir eta uppiá fjøllunum: í miðjum tær fremja teir skammloysi.
10 Í tær hava teir avdekkað nakni faðirs síns: í tær hava teir eyðmýkt hana sum var sett einsæris vegna óreinsku.
11 Og ēin hevur framt andstygd við ektakonu næsta síns; og ein annar hevur skammloysiligani dálkað sína verdóttur; og ein annar í tær hevur eyðmýkt systur sína, dóttur faðirs síns.
12 Í tær hava teir tikið gávur til at úthella blóð; tú hevurt tikið fæleigu og vøkstur, og tú hevurt grádigani ávunnist av tínum næstum við peninganoyðslu, og hevurt gloymt meg, sigur Harrin GUÐ.
13 ¶ Sí, tí havi eg sligið mína hond eftir tínum óærliga vinningi sum tú hevurt gjørt, og eftir tínum blóði sum hevur verið í miðjum tær.
14 Kann títt hjarta halda út, ella kunnu tínar hendur vera sterkar í teimum døgum sum eg skal taka *mær* av tær? eg HARRIN havi talað *tað,* og vil gera *tað*.
15 Og eg vil spjaða teg millum hinna heidnu, og dreiva teg í londini, og vil upptæra tína gravskitinsemi út úr tær.
16 Og tú skalt taka tín arv í tær sjálvari í eygsjónini á hinum heidnu, og tú skalt vita at eg *eri* HARRIN.
17 Og HARRANS orð kom at mær, sigandi,
18 Menniskjusonur, Ísraels hús er fyri mær vorðið grugg: teir allir *eru* messing, og tin, og jarn, og blýggj, í miðjum bræðsluovninum; teir eru *enntá* gruggið av silvuri.
19 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tit eru allir vorðnir grugg, sí, tí vil eg savna tykkum inn í miðja Jerusalem.
20 *Eins og* teir savna silvur, og messing, og jarn, og blýggj, og tin, inn í miðjan bræðsluovnin, at blása eldin uppá tað, at bræða *tað;* soleiðis vil eg savna *tykkum* í míni firtni og í míni øði, og eg vil eftirlata *tykkum har,* og bræða tykkum.
21 Ja, eg vil savna tykkum, og blása uppá tykkum í eldinum av míni vreiði, og tit skulu verða bræddir í miðjum honum.
22 Eins og silvur verður brætt í miðjum bræðsluovninum, soleiðis skulu tit verða bræddir í miðjum honum; og tit skulu vita, at eg HARRIN havi helt út mína øði omanyvir tykkum.
23 ¶ Og HARRANS orð kom at mær, sigandi,
24 Menniskjusonur, sig við hana, Tú *ert* landið sum er ikki reinsað, ella regnað omanyvir á degi harmavreiðinnar.
25 *Tað er* ein samansvørjing av hennara prophetum í miðjuni harav, sum ein ýlandi leyva, ránskandi *um* bráðina; teir hava upptært sálir; teir hava tikið dýrgripin og dýrabær ting; teir hava gjørt hennara mongu einkjur í miðjuni harav.
26 Hennara prestar hava brotið mína lóg, og hava halgispottað míni heilagu ting: teir hava ongan mun sett ímillum hitt heilaga og vanheilagt, eiheldur hava teir sýnt *mun* ímillum tað óreina og tað reina, og hava fjalt síni eygu frá sabbatum mínum, og eg eri halgispottaður teirra millum.
27 Hennara prinsar í miðjuni harav *eru* sum úlvar, ránskandi *um* bráðina, til at úthella blóð, *og* til at oyðileggja sálir, til at fáa óærligan vinning.

28 Og hennara prophetar hava sparslað teir við óavstemmaðum *mørtli,* síggjandi fáfongd, og spásigandi lygnir at teimum, sigandi, Svá sigur Harrin GUÐ, tá ið HARRIN hevur ikki talað.

29 Landsins fólk hava brúkt kúgan, og íðkað ræning, og hava nívt hin fátæka og tørvandi: ja, teir hava kúgað hin fremmanda rangliga.

30 Og eg søkti eftir einum manni teirra millum, sum skuldi virka upp byrgingina, og standa í gloppinum frammi fyri mær fyri landið, at eg skuldi ikki oyða tað: men eg fann ongan.

31 Tí havi eg helt út mína harmavreiði omanyvir teir; eg havi upptært teir við eldinum av míni vreiði: teirra egna veg havi eg endurgoldið omanyvir teirra høvd˙, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 23

ORÐ HARRANS kom aftur at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, tað vóru tvær kvinnur, døtrarnar hjá ēinari móður:

3 Og tær framdu hordómar í Egyptalandi; tær framdu hordómar í sínum ungdómi: har vórðu bróst teirra kroyst, og har knyltu tær vørtur jomfrúdóms síns.

4 Og nøvnini hjá teimum *vóru* Ă-hó´-lăh — hin eldra, og Ă-hól´-ĭ-băh — systir hennara: og tær vóru mínar, og tær føddu synir og døtur. Soleiðis *vóru* nøvn teirra; Să-mâr´-ĭ-â *er* Ă-hó´-lăh, og Jerusalem Ă-hól´-ĭ-băh.

5 Og Ă-hó´-lăh spældi skøkjan tá ið hon var mín; og hon sveimaði uppiyvir sínum elskarum, uppiyvir Assýriarunum *sínum* grannum,

6 *Hvørjir vóru* klæddir við bláum, høvuðsmenn og stjórnarar, allir av teimum tráiligir ungir menn, hestmenn ríðandi uppiá hestum.

7 Svá framdi hon sínar hordómar við teimum, við øllum teimum *ið vóru* hinir útvaldu menn úr Assýriu; og við øllum, uppiyvir hvørjum hon sveimaði: við øllum teirra avgudum dálkaði hon seg sjálva.

8 Eiheldur eftirlæt hon sínar hordómar, *førdar* frá Egyptalandi: tí at í hennar ungdómi lógu teir hjá henni, og teir knyltu bróst jomfrúdóms hennara, og heltu sín hordóm uppá hana.

9 Hvørsvegna eg havi flýggjað hana inn í hondina á hennar elskarum, inn í hondina á Assýriarunum, uppiyvir hvørjum hon sveimaði.

10 Hesir avdekkaðu hennara nakni: teir tóku synir hennara og døtur hennara, og vógu hana við svørðinum: og hon gjørdist navngitin millum kvenna; tí at teir høvdu útint dóm omanyvir hana.

11 Og tá ið hennara systir Ă-hól´-ĭ-băh sá *hetta,* varð hon meiri spilt í sínum ómátaliga kærleika enn hon, og í sínum hordómum meiri enn hennara systir í hordómum *hennara.*

12 Hon sveimaði uppiyvir Assýriarunum *sínum* grannum, høvuðsmenn og stjórnarar, klæddir mest yvirdádigani, hestmenn ríðandi uppiá hestum, allir av teimum tráiligir ungir menn.

13 Tá sá eg, at hon var dálkað, *at* tær *fóru* báðar ēin veg,

14 Og *at* hon økti *um* sínar hordómar: tí at tá ið hon sá menn avmyndaðar uppá múrin, myndirnar av Chăl-dē´-unum avmyndaðar við fagurreyðum,

15 Gyrdir við gyrðlum uppiá sínum lendum, berandi av í litaðum skrúði uppiá sínum høvdum, allir av teimum prinsar at síggja til, eftir háttarlaginum hjá Bábylóniarunum úr Chăl-dē´-u, landi uppruna síns:

16 Og so skjótt sum hon sá teir við eygum sínum, sveimaði hon

uppiá teimum, og sendi sendiboðar at teimum inn í Chăl-dē´-u.
17 Og Bábylóniararnir komu til hennara inn í ástarsongina, og teir dálkaðu hana við hordómi sínum, og hon varð óreinkað við teimum, og hennara hugur varð fremmandgjørdur frá teimum.
18 So hon avhuldi sínar hordómar, og avhuldi sína nakni: tá varð mín hugur fremmandgjørdur frá henni, líka sum mín hugur var fremmandgjørdur frá hennara systur.
19 Tó margfaldaði hon sínar hordómar, í at kalla til endurminningar dagarnar av sínum ungdómi, í hvørjum hon hevði spælt skøkjan í Egyptalandi.
20 Tí hon sveimaði uppiyvir teirra fríggjarum, hvørs kjøt *er sum* kjøt asna, og hvørs útflot *er sum* útflot hesta.
21 Svá kallaðirt tú til endurminningar skammloysið av tínum ungdómi, í at knylla tínar vørtur hjá Egyptunum fyri boppur ungdóms tíns.
22 ¶ Tessvegna, O Ă-hól´-ī-băh, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil reisa upp tínar elskarar ímóti tær, frá hvørjum tín hugur er fremmandgjørdur, og eg vil føra teir ímóti tær á hvørjari síðu;
23 Bábylóniararnar, og allar Chăl-dē´-ararnar, Pē´-kŏd, og Sjŏ´-ă, og Kŏ´-ă, *og* allar Assýriararnar við teimum: allir av teimum tráiligir ungir menn, høvuðsmenn og stjórnarar, miklir harrar og navnframir, allir av teimum ríðandi uppiá hestum.
24 Og teir skulu koma ímóti tær við hervagnum, vagnum, og hjólum, og við einum savnaði av fólki, *sum* skulu seta ímóti tær smáskjøld og skjøld og hjálma runt umkring: og eg vil seta dóm frammi fyri teimum, og teir skulu døma teg samsvarandi við sínar dómar.
25 Og eg vil seta mína ástbrelni ímóti tær, og teir skulu fara øðisligani við tær: teir skulu taka burt tína nøs og tíni oyru; og tín leivd skal falla við^ svørðinum: teir skulu taka synir tínar og døtur tínar; og títt avlop skal verða upptært av eldinum.
26 Teir skulu eisini nekta teg úr tínum klæðum, og taka burt tínar føgru smúkkur.
27 Svá vil eg fáa títt skammloysi at halda uppat frá tær, og tín hordóm — *førdan* frá Egyptalandi: so at tú skalt ikki lyfta upp eygum tínum at teimum, ella minnast Egyptaland meira.
28 Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil flýggja teg inn í hondina *á teim* sum tú hatart; inn í hondina *á teim,* frá hvørjum tín hugur er fremmandgjørdur:
29 Og teir skulu fara við tær á hatursfullan *hátt,* og skulu taka burt alt títt strev, og skulu eftirlata teg nakna og bera: og naknin av tínum hordómum skal verða avdekkað, bæði títt skammloysi og tínir hordómar.
30 Eg vil gera hesi *ting* innat tær, av tí at tú hevurt farið horandi eftir hinum heidnu, *og* av tí at tú ert óreinskað við teirra avgudum.
31 Tú hevurt gingið í vegi systur tínar; tí vil eg geva hennara bikar inn í hond tína.
32 Svá sigur Harrin GUÐ; Tú skalt drekka úr bikarinum hjá tíni systur — djúpum og miklum: tú skalt verða lædin í háð og hildin fyri gjøldur; tað inniheldur nógv.
33 Tú skalt verða fylt við fyllskapi og sorg, við bikarinum av ørtan og oyðinskapi, við bikarinum hjá tíni systur, Să-mâr´-ī-ŭ.
34 Tú skalt enntá drekka tað og súgva *tað* út, og tú skalt bróta brotini harav, og slíta av tíni egnu bróst: tí at eg havi talað *tað,* sigur Harrin GUÐ.

35 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tú hevurt gloymt meg, og kastað meg afturum títt bak, tessvegna ber tú eisini títt skammloysi og tínar hordómar.

36 ¶ HARRIN segði harafturat við meg; Menniskjusonur, vilt tú døma Á-hó´-lŭh og Á-hól´-ĭ-bŭh? ja, kunnger at teimum teirra andstygdir;

37 At tær hava framt hordóm, og blóð *er* í teirra hondum, og við sínum avgudum hava tær framt hordóm, og hava eisini volt sínum sonum, sum tær føddu mær, at fara fyri seg ígjøgnum *eldin,* at upptæra *teir.*

38 Harafturat, hetta hava tær gjørt innat mær: tær hava dálkað mín halgidóm í tí sama deginum, og hava halgispottað mínar sabbatar.

39 Tí at tá ið tær høvdu vigið síni børn til avguda sína, tá komu tær hin sama dagin inn í mín halgidóm at halgispotta hann; og sí, svá hava tær gjørt í miðjum húsi mínum.

40 Og ennvíðari, at tit hava sent eftir monnum at koma fjarvegis frá, at hvørjum eitt sendiboð *varð* sent; og sí, teir komu: fyri hvørjar tú tváaðirt tær, málaðirt eygu tíni, og skrýddirt teg við prýðislutum,

41 Og satst uppiá eini hábærsligari song, og eitt borð fyribúgvið frammanfyri henni, hvaruppá tú hevurt sett mítt roykilsi og mína olju.

42 Og ein rødd av eini fjøld, verandi við ró, *var* hjá henni: og hjá monnunum av tí meiniga slagnum *vórðu* førdir Sâ-bĕ´-arar frá oyðuni, sum koyrdu armringar uppá sínar hendur, og fagrar krúnur uppá síni høvd.

43 Tá segði eg við *hana sum var* gomul í hordómum, Vilja teir nú fremja hordómar við henni, og hon *við teimum?*

44 Tó fóru teir inn at henni, sum teir fara inn at eini kvinnu sum spælir skøkjan: soleiðis fóru teir inn at Á-hó´-lŭh og at Á-hól´-ĭ-bŭh, skammleysu kvinnunum.

45 ¶ Og hinir rættvísu menn, teir skulu døma tær eftir háttarlaginum hjá horinnum, og eftir háttarlaginum hjá kvinnum sum úthella blóð; av tí at tær *eru* horinnur, og blóð *er* í teirra hondum.

46 Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil føra niðan ein flokk omanyvir tær, og vil geva tær til at verða burtfluttar og rændar.

47 Og flokkurin skal steina tær við steinum, og avgreiða tær við sínum svørðum; teir skulu vega teirra synir og teirra døtur, og brenna upp teirra hús við eldi.

48 Svá vil eg elva skammloysi at halda uppat út úr landinum, at allar kvinnur mega verða lærdar ikki at gera eftir tykkara skammloysi.

49 Og teir skulu endurgjalda tykkara skammloysi omanyvir tykkum, og tit skulu bera syndirnar av tykkar avgudum: og tit skulu vita, at eg *eri* Harrin GUÐ.

KAPITUL 24

AFTUR í tí níggjunda árinum, í hinum tíggjunda mánaði, í hinum tíggjunda *degi* mánaðarins, kom orð HARRANS at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, skriva tær navnið á deginum, *enntá* á hesum sama deginum: kongurin av Bábylon setti seg sjálvan ímóti Jerusalem henda sama dag.

3 Og mæl eina dømisøgu at hinum uppreistrarsama húsi, og sig við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Set útá ein pott, set *hann* útá, og eisini hell vatn inn í hann:

4 Savna stykkini harav inn í hann, *enntá* hvørt gott stykki, tjógvið, og bøgin; fyll *hann* við hinum úrvals beinum.

5 Tak hitt úrvals hjá fylginum, og brenn eisini beinini undir tí, *og* fá tað *at* kóka væl, og lat teir sjóða beinini av tí harí.

6 ¶ Hvørsvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Vei til hins blóðiga staðar, til pottin, hvørs skúm *er* harí, og hvørs skúm er ikki farið úr honum! før tað út, stykki eftir stykki; lat ongan lut detta uppá tað.

7 Tí at hennara blóð er í miðjuni av henni; hon setur tað uppá toppin av einum kletti; hon helti tað ikki uppá jørðina, at dekka tað við støvi;

8 At tað mátti elva øði at koma upp til at taka hevnd; eg havi sett hennara blóð uppá toppin av einum kletti, at tað skuldi ei verða dekkað.

9 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Vei til hins blóðiga staðar! eg vil enntá gera stápilin til eld miklan.

10 Hópið á við, kyndið eldin, upptærið kjøtið, og kryddið tað væl, og latið beinini verða brend.

11 Síðan setið tað tómt uppá kolini harav, at messingurin av tí má vera heitur, og má brenna, og *at* gravskitinleikin av tí má vera bræddur í tí, *at* skúmið av tí má verða upptært.

12 Hon hevur troyttað *seg* við lygnum, og hennara mikla skúm fór ikki fram út úr henni: hennara skúm *skal vera* í eldinum.

13 Í tínum gravskitinleika *er* skammloysi: vegna tess at eg havi reinskað teg, og tú varðst ikki reinskað, skalt tú ei verða reinskað frá tínum gravskitinleika meira, til eg havi volt míni øði at hvíla uppiá tær.

14 Eg, HARRIN, havi talað *tað:* tað skal bera á, og eg vil gera *tað;* eg vil ei fara tilbakar, eiheldur vil eg spara, eiheldur vil eg iðrast; samsvarandi við tínar vegir, og samsvarandi við tínar gerðir, skulu teir døma teg, sigur Harrin GUÐ.

15 ¶ Eisini kom orð HARRANS at mær, sigandi,

16 Menniskjusonur, sí, eg taki burtur frá tær tráina hjá tínum eygum við einum smekki: tó hvørki skalt tú harma ella gráta, eiheldur skulu tár tíni renna niður.

17 Lat vera *við* at gráta, inn onga harman yvir hini deyðu, bint prýðishúgvu høvurs tíns uppá teg, og far í tínar skógvar uppá tínar føtur, og hyl ikki varrar *tínar,* og et ikki mannabreyð.

18 So eg talaði yvirat fólkinum um morgunin: og um kvøld*ið* doyði kona mín; og eg gjørdi um morgunin eins og mær var boðið.

19 ¶ Og fólkið segði við meg, Vilt tú ikki siga okkum, hvat hesi *ting eru* fyri okkum, at tú gert *so?*

20 Tá svaraði eg teimum, HARRANS orð kom at mær, sigandi,

21 Tala yvirat Ísraels húsi, Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil vanhalga mín halgidóm, avbærleikan av tykkara styrki, tráina hjá eygum tykkara, og tað sum tykkara sál tekur synd í; og tykkara synir og tykkara døtur, sum tit hava eftirlatið, skulu falla við svørðinum.

22 Og tit skulu gera sum eg havi gjørt: tit skulu ikki dekka *tykkara* varrar, ella eta mannabreyð.

23 Og tykkara prýðishúgvur *skulu vera* uppiá høvdum tykkara, og tykkara skógvar uppiá fótum tykkara: tit skulu ikki harma, ella gráta; men tit skulu fána burt fyri tykkara misgerðir, og harma hvør móti øðrum.

24 Soleiðis er Ê-zēk´îēl tykkum eitt tekin: samsvarandi við alt, sum hann hevur gjørt, skulu tit gera: og tá ið hetta kemur, skulu tit vita, at eg *eri* Harrin GUÐ.

25 Eisini, tú menniskjusonur, *skal tað* ikki *verða* á tí degi tá ið eg taki frá teimum teirra styrki,

frøina av teirra dýrd, tráina hjá teirra eygum, og tað, hvaruppá teir seta sínar hugar, teirra synir og teirra døtur,

26 *At* hann, sum kemst undan í tí degi, skal koma til tín, at elva *tær* at hoyra *tað* við *tínum* oyrum?

27 Í tí degi skal tín muður verða opnaður fyri honum sum hevur komist undan, og tú skalt tala, og vera ei meira málleysur: og tú skalt vera teimum eitt tekin; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 25

ORÐ HARRANS kom aftur at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, set títt andlit ímóti Ammonitunum, og prophetera ímóti teimum;

3 Og sig at Ammonitunum, Hoyrið orð Harrans GUÐS; Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tú segðirt, Há, ímóti halgidómi mínum, tá ið hann varð vanhalgaður; og ímóti landi Ísraels, tá ið tað varð oyði; og ímóti húsi Judah, tá ið teir fóru inn í fangaskap;

4 Sí, tí vil eg flýggja teg til mannanna úr eystri til ognar, og teir skulu seta slott síni í tær, og gera bústaðir sínar í tær: teir skulu eta ávøkst tín, og teir skulu drekka mjólk tína.

5 Og eg vil gera Răb′-băh *til* ein stall til kamelar, og Ammonitarnar *til* eitt ból til smáfæafylgir: og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

6 Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tú hevurt klappað hendur *tínar,* og trampað við fótunum, og fegnast í hjarta við allari tíni meinfýsni ímóti landi Ísraels;

7 Sí, tí vil eg strekkja út mína hond omanyvir teg, og vil flýggja teg til ein fong til hinna heidnu; og eg vil skera teg av frá fólkinum, og eg vil elva tær at týnast úr londunum: eg vil oyðileggja teg; og tú skalt vita, at eg *eri* HARRIN.

8 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at Móab og Sē′-īr siga, Sí, Judah hús *er* líkt øllum teimum heidnu;

9 Tessvegna, sí, eg vil opna síðuna av Móab frá staðunum, frá hansara staðum *sum eru* á hermótum hans, dýrd landsins, Bĕth-jĕsj′-ī-mōth, Bā′-ăl-mē′-ōn, og Kĭr-já-thá′-ĭm,

10 Fyri monnunum úr eysturi við Ammonitunum, og vil geva teir í ogn, at Ammonitarnir mega ikki verða mintir millum tjóðanna.

11 Og eg vil útinna dómar omanyvir Móab; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

12 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at Ē′-dóm hevur handlað ímóti Judah húsi við at taka hevnd, og hevur stórliga forbrotið *seg,* og hevnt seg omanyvir teir;

13 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil eisini strekkja út mína hond omanyvir Ē′-dóm, og vil skera av mann og djór frá tí; og eg vil gera tað oyði frá Tē′-măn; og teir úr Dē′-dăn skulu falla við svørðinum.

14 Og eg vil leggja mína hevnd omanyvir Ē′-dóm við hondini á mínum fólki Ísrael: og teir skulu gera í Ē′-dóm samsvarandi við mína firtni og samsvarandi við mína øði; og teir skulu kenna hevnd mína, sigur Harrin GUÐ.

15 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at Philistarnir hava farið at við hevnd, og hava tikið hevnd við einum meinfýsnisfullum hjarta, at oyða *tað* fyri hitt gamla hatur;

16 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil strekkja út mína hond omanyvir Philistarnar, og eg vil skera av Chĕr-ĕ-thĭm′-arnar, og oyða leivd sævarstrandarinnar.

17 Og eg vil útinna mikla hevnd omanyvir teir við øðisligum

hartingum; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg skal leggja mína hevnd omanyvir teir.

KAPITUL 26

OG tað bar á í tí ellivta árinum, í hinum fyrsta *degi* mánaðarins, *at* HARRANS orð kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, av tí at Týrūs hevur sagt ímóti Jerusalem, Há, hon er brotin, *sum var* portrini hjá fólkinum: hon er vend at mær: eg skal verða fyltur upp, *nú* er hon løgd *í* oyði:

3 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg *eri* ímóti tær, O Týrūs, og vil volda mongum tjóðum at koma niðan ímóti tær, eins og sjógvurin veldur sínum aldum at koma upp.

4 Og teir skulu oyðileggja múrarnar av Týrūs, og bróta niður tornini hjá henni: eg vil eisini skrava hennara dust frá henni, og gera hana sum toppin av einum kletti.

5 Tað skal vera *eitt pláss til* breiðingina av gørnum í miðjum sjónum: tí at eg havi talað *tað*, sigur Harrin GUÐ: og tað skal gerast ein fongur hjá tjóðunum.

6 Og hennara døtur, sum *eru* í akrinum, skulu verða vignar við svørðinum; og tær skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

7 ¶ Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil føra omanyvir Týrūs Nĕ-bū-chăd-rēz'-zar kong av Bábylon, ein kong konga, frá norðan, við hestum, og við hervagnum, og við hestmonnum, og flokkum, og nógvum fólki.

8 Hann skal vega við svørðinum tínar døtur í akrinum: og hann skal gera ein festning ímóti tær, og laða ein virkisgarð ímóti tær, og lyfta upp smáskjøldurin ímóti tær.

9 Og hann skal seta krígsmaskinur ímóti múrum tínum, og við sínum øksum skal hann bróta niður torn tíni.

10 Uppá grund av ríkiligleikanum av hansara hestum skal teirra dust hylja teg: tínir múrar skulu rista við ljóðið av hestmonnunum, og av hjólunum, og av hervagnunum, tá ið hann skal innfara inn í tíni portur, eins og menn innfara inn í ein stað, í hvørjum er gjørdur ein brestur.

11 Við hógvunum á sínum hestum skal hann traðka niður allar gøtur tínar: hann skal bana tínum fólki við svørðinum, og tíni sterku setulið skulu fara niður til jarðarinnar.

12 Og teir skulu gera ein herfong av ríkdómum tínum, og gera eina bráð úr handilsvørum tínum: og teir skulu bróta niður múrar tínar, og oyðileggja tíni dámligu hús: og teir skulu leggja tínar steinar og títt timbur og títt støv í miðjum vatninum.

13 Og eg vil elva ljóðinum av tínum sangum at halda uppat; og ljóðið av tínum hørpum skal verða ei meira hoyrt.

14 Og eg vil gera teg eins og toppin av einum kletti: tú skalt vera *eitt pláss* til at breiða gørn uppá; tú skalt verða bygd ei meira: tí at eg, HARRIN, havi talað *tað*, sigur Harrin GUÐ.

15 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ til Týrūs-ar; Skulu ikki oyggjarnar rista við ljóðið av falli tínum, tá ið teir særdu geyla, tá ið slátrið verður gjørt í miðjum tær?

16 Tá skulu allir prinsar havsins koma niður frá hásætum sínum, og leggja burt sínar skikkjur, og fara úr sínum skreytaðu klæðum: teir skulu klæða seg við nøtran, teir skulu sita uppiá jørðini, og skulu skelva á *hvørjari* stund, og vera ógvaðir yvir teg.

17 Og teir skulu taka upp eitt harmljóð um teg, og siga til tín, Hvør ert tú oyddur, *sum vart*

búgvin í av sjófarandi monnum, hin navnframi staður, sum vart sterkur á sjónum, hann og íbúgvar hans, sum fáa sína ræðslu *at vera* á øllum sum heimsøkja hann!

18 Nú skulu oyggjarnar nøtra á deginum av tínum falli; ja, oyggjarnar sum *eru* í sjónum skulu verða órógvaðar við tína fráferð.

19 Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Tá ið eg skal gera teg *til* ein oydnan stað, líka *sum* staðirnar sum eru ikki búnir í; tá ið eg skal føra upp djúpið uppá teg, og mikil vøtn skulu hylja teg;

20 Tá ið eg skal føra teg niður við teimum sum stíga niður inn í holuna, við fólkinum frá gamlari tíð, og skal seta teg í hinar lágu partar jarðarinnar, í plass — oyðin úr forðum, við teimum ið fara niður til holuna, at tú verði ikki búgvin í; og eg skal seta dýrd í land teirra livandi;

21 Vil eg gera teg *til* eina ræðslu, og tú *skalt vera* ei *meira:* tó *at* tú verði søktur eftir, tó skalt tú aldri verða funnin aftur, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 27

ORÐ HARRANS kom aftur at mær, sigandi,

2 Nú, tú menniskjusonur, tak upp eitt harmljóð um Tý́-rūs;

3 Og sig yvirat Tý́-rūs-i, O tú sum ert staðsettur við innfaring havsins, *sum ert* ein handilsmaður hjá fólkinum fyri mangar oyggjar, Svá sigur Harrin GUÐ; O Tý́-rūs, tú hevurt sagt, Eg *eri* av fullkomnum vakurleika.

4 Tíni mørk *eru* í miðjum sjógvunum, tínir byggjarar hava fullkomingjørt tín vakurleika.

5 Teir hava gjørt øll tíni *skips*-borð av aðalgranntrøum úr Sḗ-nîr: teir hava tikið sedris*trø* frá Lī́-bă-nŏn til at gera mastrar til tín.

6 *Av* Bá́-sjän-s eikum hava teir gjørt tínar árar; flokkurin av Asjuritunum hava gjørt tínar bekkir *av* fílabeini, *ført* úr Chīt́-tĭm-s oyggjum.

7 Fínt lín við skreytaðum arbeiði úr Egyptalandi var tað sum tú breiddirt fram til at vera segl títt; blátt og purpur frá Ē-lī́-sjăh oyggjum var tað sum dekkaði teg.

8 Íbúgvarnir av Zī́-dŏn og Arvad vóru sjómenn tínir: tínir vís*menn*, O Tý́-rūs, *sum* vóru í tær, vóru stýrimenn tínir.

9 Hinir avgomlu úr Gḗ-băl og vís*menninir* hjá tí vóru í tær tínir tættarar: øll havsins skip við sínum sjómonnum vóru í tær til at starva handilsvøru tína.

10 Teir úr Persiu og úr Lŭd og úr Phŭt vóru í heri tínum, krígsmenn tínir: teir hongdu skjøldurin og hjálmin í tær; teir framdu tín tekkiligleika.

11 Menninir úr Arvad við tínum heri *vóru* uppiá tínum múrum runt umkring, og Găm-mădĭḿ-arnir vóru í tornum tínum: teir hongdu sínar skildir uppá tínar múrar runt umkring; teir hava gjørt tín vakurleika fullkomnan.

12 Tarsjisj *var* tín handilsmaður orsakað av fjøldini av øllum *slagi av* ríkidømum; við silvuri, jarni, tini, og blýggi, handlaðu teir á sølustevnum tínum.

13 Já́-văn, Tū́-băl, og Mḗ-sjĕch, teir *vóru* handilsmenn tínir: teir handlaðu persónar manna og íløt av messing á marknaði tínum.

14 Teir av Tô-găŕ-măh húsi handlaðu á tínum sølustevnum við hestum og hestmonnum og múldjórum.

15 Menninir úr Dḗ-dăn *vóru* handilsmenn tínir; mangar oyggjar *vóru* handilsvøra handar tínar: teir bóru tær *til* eina gávu hornˇ av fílabeini og íbenviði.

16 Sýria *var* tín handilsmaður orsakað av fjøldleikanum av vørunum av tíni virkan: teir
starvaðu á tínum stevnum við smaragdum, purpuri, og skreytaðum arbeiði, og fínum líni, og
korall, og agát.
17 Judah, og land Ísraels, teir *vóru* handilsmenn tínir: teir handlaðu á tínum marknaði
hveiti úr Mĭn′-nĭth, og Păn′-năg, og hunang, og olju, og balsam.
18 Damascus *var* tín handilsmaður í fjøldleikanum av vørunum av tíni virkan, fyri fjøldina
av øllum ríkidømum; í víninum úr Hĕl′-bŏn, og hvítari ull.
19 Dán eisini og Já′-vän, farandi til og frá, starvaðu á tínum stevnum: bjart jarn, kassia, og kalmus,
vóru á tínum marknaði.
20 Dĕ′-dăn *var* tín handilsmaður í dýrabærum klæðum til hervagnar.
21 Arabia, og allir prinsarnir úr Kē′-dăr, teir starvaðu við tær í lombum, og veðrum, og geitum:
í hesum *teir vóru* tínir handilsmenn.
22 Handilsmenninir úr Sjĕ′-bă og Rā′-ă-mâh, teir *vóru* handilsmenn tínir: teir starvaðu á tínum sølustevnum við fremstum av øllum kryddurtum, og við øllum dýrabærum steinum, og gulli.
23 Hár′-ăn, og Căn′-nēh, og Eden, handilsmenninir úr Sjē′-bă, Ăssj′-ŭr, *og* Chĭl′-măd, *vóru* handilsmenn tínir.
24 Hesir *vóru* tínir handilsmenn í alskyns *tingum,* í bláum klæðum, og skreytaðum arbeiði, og í kistum av ríkum skarti, bundnar við bondum, og gjørdar av sedris*viði,* millum handilsvøru tína.
25 Skipini úr Tarsjisj sungu um teg á marknaði tínum: og tú varðst fyltur upp, og gjørdur sera dýrdsamur í miðjum sjógvunum.
26 ¶ Tínir rógvarar hava ført teg inn í mikil vøtn: eystanvindurin hevur brotið teg í miðjum sjógvunum.
27 Tínir ríkdómar, og tínar sølustevnur, tín handilsvøra, tínir sjómenn, og tínir stýrimenn, tínir tættarar, og starvararnir av tíni handilsvøru, og allir tínir krígsmenn, sum *eru* í tær, og í øllum tínum flokki sum *er* í miðjum tær, skulu falla inn í miðju sjógvanna á deginum av tíni oyðing.
28 Forstaðirnir skulu rista við ljóðið av geylinum av tínum stýrimonnum.
29 Og allir sum handfara árina, sjómenninir, *og* allir stýrimenn havsins, skulu koma niður frá skipum sínum, teir skulu standa uppiá landinum;
30 Og skulu volda síni rødd at verða hoyrda ímóti tær, og skulu geyla beiskliga, og skulu kasta upp dust uppá síni høvur, teir skulu velta sær í øskunum:
31 Og teir skulu gera seg fullkomiliga skallutar tín vegna, og gyrða seg við sekkjaklæði, og teir skulu gráta um teg við beiskleika hjartans *og* beiskari venan.
32 Og í síni venan skulu teir taka upp eitt harmljóð um teg, og harma yvir teg, *sigandi,* Hvør *staður er* líka *sum* Týr′-rŭs, líka *sum* hin oyddi í miðjum havinum?
33 Tá ið tínar vørur fóru fram úr sjógvunum, mettaðirt tú mong fólk; tú uppríkaðirt jarðarinnar kongar við fjøldini av tínum ríkidømum og av tíni handilsvøru.
34 Á teirri tíð, *tá ið* tú skalt verða brotin av høvunum í vatnanna dýpdum, skal tín handilsvøra og allur tín flokkur í miðjum tær falla.
35 Allir íbúgvar oyggjanna skulu verða ógvaðir yvir teg, og teirra kongar skulu verða sára ræddir, teir skulu verða órógvaðir í *síni* ásjón.
36 Handilsmenninir millum fólksins skulu fisa eftir tær; tú

skalt verða ein ræðsla, og aldri *skalt vera* meira.

KAPITUL 28

ORÐ HARRANS kom aftur at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, sig yvirat prinsinum av Týrus, Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at títt hjarta *er* lyft upp, og tú hevurt sagt, Eg *eri* ein Guð, eg siti *í* sæti Guðs, í miðjum sjógvunum; tó *ert* tú ein maður, og ikki Guð, tó *at* tú seti títt hjarta sum hjarta Guðs:

3 Sí, tú *ert* vísari enn Dániel; tað er einkið loyndarmál sum teir kunnu fjala frá tær:

4 Við tínum vísdómi og við tínum skili hevurt tú skaffað tær ríkdómar, og hevurt skaffað gull og silvur inn í tínar fæhirðslur:

5 Við tínum mikla vísdómi *og* við tínum handilsskapi hevurt tú økt tínar ríkdómar, og títt hjarta er lyft upp uppá grund av tínum ríkdómum:

6 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tú hevurt sett títt hjarta sum hjarta Guðs;

7 Sí, tí vil eg føra fremmandar omanyvir teg, tjóðanna ræðuligu: og teir skulu draga síni svørð ímóti vakurleikanum av tínum vísdómi, og teir skulu dálka tín bjartleika.

8 Teir skulu føra teg niður til holuna, og tú skalt doyggja deyðarnar hjá *teimum sum eru* vignir í miðjum sjógvunum.

9 Vilt tú enn siga frammi fyri honum sum vegur teg, Eg *eri* Guð? men tú *skalt vera* ein maður, og eingin Guð, í hondini á honum sum vegur teg.

10 Tú skalt doyggja deyðarnar hjá hinum óumskornu við hondini á fremmandum: tí at eg havi talað *tað*, sigur Harrin GUÐ.

11 ¶ Harafturat kom HARRANS orð at mær, sigandi,

12 Menniskjusonur, tak upp eitt harmljóð omanyvir kongin av Týrus, og sig at honum, Svá sigur Harrin GUÐ; Tú siglart inn samløguna, fullur av vísdómi, og fullkomin í vakurleika.

13 Tú hevurt verið í Eden, Guðs aldingarði; hvør dýrabærur steinur *var* tín dekking, sardisin, tōpaz, og diamanturin, beryllurin, ónyksin, og jaspisin, sapphīrurin, smaragdurin, og karfunkulin, og gull: handverkið av tínum tamburīnum og av tínum pípum var fyribúgvið í tær á tí degi sum tú varðst skaptur.

14 Tú *ert* hin salvaði cherubur sum dekkar; og eg havi sett teg *soleiðis:* tú vart uppiá hinum heilaga fjalli Guðs; tú hevurt gingið niðan og oman í miðjum elds-steinunum.

15 Tú *vart* fullkomin í tínum vegum frá tí degi sum tú varðst skaptur, til misgerð varð funnin í tær.

16 Við fjøldsemini av tínum handilsskapi hava teir fylt tína mittu við harðskapi, og tú hevurt syndað: tí vil eg kasta teg sum vanheilagan út av fjalli Guðs: og eg vil oyða teg, O hyljandi cherubur, frá miðjum elds-steinunum.

17 Títt hjarta varð lyft upp uppá grund av tínum vakurleika, tú hevurt spilt tín vísdóm uppá grund av tínum bjartleika: eg vil kasta teg til jarðarinnar, eg vil leggja teg frammi fyri kongum, at teir mega skoða teg.

18 Tú hevurt dálkað tínar halgidómar við fjøldleikanum av tínum misgerðum, við misgerðini av tínum handilsskapi; tí vil eg føra fram ein eld frá miðjum tær, hann skal upptæra teg, og eg vil føra teg til øskur uppiá jørðini í eygsjónini á øllum teimum sum skoða teg.

19 Allir teir sum kenna teg millum fólksins skulu verða ovfarnir yvir teg: tú skalt vera ein ræðsla, og aldri *skalt* tú *vera* meira.

20 ¶ Aftur kom HARRANS orð at mær, sigandi,
21 Menniskjusonur, set títt andlit ímóti Zī´dön, og prophetera ímóti tí,
22 Og sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg *eri* ímóti tær, O Zī´dön; og eg vil verða dýrðmettur í miðjari tær: og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg skal hava útint dómar í henni, og skal verða halgaður í henni.
23 Tí at eg vil senda inn í hana drepsótt, og blóð inn á gøtur hennara; og hinir særdu skulu verða dømdir í miðjari henni viðˆ svørðinum uppiá henni á hvørjari síðu; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.
24 ¶ Og har skal ei meira vera ein prikandi tistla yvirfyri Ísraels húsi, ella *nakar* nívandi tornur av øllum *sum eru* runt umkring teir sum vanvirdu teir; og teir skulu vita, at eg *eri* Harrin GUÐ.
25 Svá sigur Harrin GUÐ; Tá ið eg skal hava savnað Ísraels hús frá fólkinum, hvørja millum teir eru spjaddir, og skal verða halgaður í teimum í eygsjónini á hinum heidnu, tá skulu teir búgva í landi sínum, sum eg havi givið til tænara míns Jákobs.
26 Og teir skulu búgva tryggligani harí, og skulu byggja húsˇ og planta víngarðar; ja, teir skulu búgva við treysti, tá ið eg havi útint dómar omanyvir allar teir sum vanvirða teir rundan um teir; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN Guð teirra.

KAPITUL 29

Í TÍ tíggjunda árinum, í tí tíggjunda *mánaðinum,* í hinum tólvta *degi* mánaðarins, kom orð HARRANS at mær, sigandi,
2 Menniskjusonur, set títt andlit ímóti Pharaoh kongi av Egyptalandi, og prophetera ímóti honum, og ímóti øllum Egyptalandi:
3 Tala, og sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg *eri* ímóti tær, Pharaoh kongur av Egyptalandi, hin mikli dreki sum liggur í miðjum áum sínum, sum hevur sagt, Mín á *er* mín egna, og eg havi gjørt *hana* til mín sjálvs.
4 Men eg vil seta húkar í kjálkar tínar, og eg vil elva fiskinum av áum tínum at loða at skølum tínum, og eg vil føra teg upp út úr miðjum áum tínum, og allur fiskurin av áum tínum skal loða at skølum tínum.
5 Og eg vil eftirlata teg *tveittan* inn í oyðuna, teg og allan fiskin av áum tínum: tú skalt falla omanyvir hinar opnu akrar; tú skalt ikki verða førdur saman, ella savnaður: eg havi givið teg til matnað til djórˇ akursins og til fuglar himinsins.
6 Og allir íbúgvar Egyptalands skulu vita, at eg *eri* HARRIN, av tí at teir hava verið ein stavur av sevi fyri húsi Ísraels.
7 Tá ið teir tóku hald á tær eftir hond tíni, brotnaðirt tú, og skræddirt alla teirra øksl: og tá ið teir lenaðust uppá teg, brotnaðirt tú, og fekst allar teirra lendar at vera í eini støðu.
8 ¶ Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil føra eitt svørð omanyvir teg, og skera av mann og djór út úr tær.
9 Og Egyptaland skal verða reynað og oyði; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN: av tí at hann hevur sagt, Áin *er* mín, og eg havi gjørt *hana*.
10 Sí, eg *eri* tessvegna ímóti tær, og ímóti áum tínum, og eg vil gera Egyptaland fullkomiliga oyði *og* reynað, frá torni Sý-ē´-nē enntá at marki Ê-thī-ō´-pī-ù.
11 Eingin fótur á manni skal fara ígjøgnum tað, ella fótur á djóri skal fara ígjøgnum tað, eiheldur skal tað verða búð í *í* fjøruti ár.

12 Og eg vil gera Egyptaland oyði í miðjum londunum *sum eru* oyðin; og hennara staðir millum staðanna, *sum eru* lagdir *í* oyði, skulu vera oydnir *í* fjøruti ár: og eg vil spjaða Egyptarnar tjóðanna millum, og vil dreiva teir ígjøgnum londini.

13 ¶ Tó, svá sigur Harrin GUÐ; Við endan á fjøruti árum vil eg savna Egyptarnar frá fólkinum, hvagar teir vórðu spjaddir:

14 Og eg vil føra aftur Egyptalands fangaskap; og vil elva teimum at venda aftur *inn í* land Păth′-rŏs-ar, inn í landið av teirra bústaði; og teir skulu vera har eitt niðarligt kongadømi.

15 Tað skal vera hitt niðarligasta av kongadømunum; eiheldur skal tað upphevja seg sjálvt meir uppum tjóðirnar: tí at eg vil minka um teir, at teir skulu ei meira ráða yvir tjóðunum.

16 Og tað skal vera ei meira álitið hjá Ísraels húsi, sum førir *teirra* misgerð til endurminningar, tá ið teir skulu hyggja eftir teimum: men teir skulu vita, at eg *eri* Harrin GUÐ.

17 ¶ Og tað bar á í tí sjey og tjúgunda árinum, í hinum fyrsta *mánaðinum,* í hinum fyrsta *degi* mánaðarins, kom orð HARRANS at mær, sigandi,

18 Menniskjusonur, Nĕ-bŭ-chăd-rēz′-zâr kongur av Bábylon voldi sínum heri at tæna eina mikla tænastu ímóti Tý′-rŭs-i: hvørt høvd *varð* gjørt skallut, og hvør øksl *varð* flust: tó hevði hann onga løn, ella hans herur, fyri Tý′-rŭs, fyri ta tænastu sum hann hevði tænt ímóti tí:

19 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil geva Egyptaland at Nĕ-bŭ-chăd-rēz′-zâr kongi av Bábylon; og hann skal taka fjøld hennara, og taka fong hennara, og taka býti hennara; og tað skal vera lønin til her hansara.

20 Eg havi givið honum Egyptaland *fyri* hansara strev, við hvørjum hann tænti ímóti tí, vegna tess at teir virkaðu fyri meg, sigur Harrin GUÐ.

21 ¶ Á tí degi vil eg volda horni Ísraels húss at spíra fram, og eg vil geva tær opningina av munninum í miðjum teimum; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 30

ORÐ HARRANS kom aftur at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, prophetera og sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Ylið tit, Vei degnum vert!

3 Tí at dagurin *er* nær, enntá dagur HARRANS *er* nær, ein skýggjutur dagur; tað skal vera tíð teirra heidnu.

4 Og svørðið skal koma omanyvir Egyptaland, og mikil pína skal vera í Ê-thĭ-ō′-pĭ-ŭ, tá ið hinir vignu skulu falla í Egyptalandi, og teir skulu taka burtur fjøld hennara, og hennara grundvøllir skulu verða brotnir niður.

5 Ê-thĭ-ō′-pĭ-ă, og Lĭ′-bў-a, og Lýdia, og alt tað blandaða fólkið, og Chub, og menn landsins sum er í bandalagi, skulu falla við teimum við svørðinum.

6 Svá sigur HARRIN; Teir eisini, sum uppihalda Egyptalandi, skulu falla; og stoltleikin av hennara mátti skal koma niður: frá torni Sý-ē′-nĕ skulu teir falla í tí við svørðinum, sigur Harrin GUÐ.

7 Og teir skulu verða oydnir í miðjum londunum *sum eru* oyðin, og hennara staðir skulu vera í miðjum staðunum *sum eru* avtoftaðir.

8 Og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg havi sett ein eld í Egyptaland, og *tá ið* allir hennara hjálparar skulu verða oyddir.

9 Á tí degi skulu sendisveinar

fara fram frá mær í skipum at gera hinar sútleysu Ê-thĭ-ŏ´-pĭ-arar ræddar, og mikil pína skal koma uppá teir, sum á Egyptalands degi: tí at sí, hann kemur.

10 Svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil eisini fáa fjøld Egyptalands at halda uppat viðˆ hond Nĕ-bŭ-chăd-rēz´-zâr kongs av Bábylon.

11 Hann og hansara fólk við honum, tjóðanna ræðuligu, skulu verða førdir at oyða landið: og teir skulu draga síni svørð ímóti Egyptalandi, og fylla landið við hinum vignu.

12 Og eg vil gera áirnar turrar, og selja landið inn í hondina á hinum vondu: og eg vil gera landið oyði, og alt sum er harí, viðˆ hondini á fremmandum: eg HARRIN havi talað *tað*.

13 Svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil eisini oyðileggja avgudarnar, og eg vil volda *teirra* myndum at halda uppat burtur úr Nōph; og har skal vera ei meira ein prinsur av Egyptalandi: og eg vil leggja ein ótta í Egyptaland.

14 Og eg vil gera Păth´-rŏs oyði, og vil koyra eld í Zŏ´-ân, og vil útinna dómar í Nō.

15 Og eg vil hella mína øði uppá Sīn, Egyptalands styrki; og eg vil skera av fjøldina hjá Nō.

16 Og eg vil seta eld í Egyptalandi: Sīn skal hava mikla pínu, og Nō skal verða skrætt sundur, og Nōph *skal hava* neyðarstandir dagliga.

17 Teir ungu menninir úr Ā´-vĕn og úr Pî-bē´-sĕth skulu falla viðˆ svørðinum: og hesir *staðirnir* skulu fara inn í fangaskap.

18 Í Tĕ-hăph´-nē-hēs eisini skal dagurin verða myrkjaður, tá ið eg skal bróta har okini hjá Egyptalandi: og skrúðið av hennara styrki skal halda uppat í henni: hvat viðvíkur henni, eitt skýggj skal dekka hana, og hennara døtur skulu fara inn í fangaskap.

19 Svá vil eg útinna dómar í Egyptalandi: og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

20 ¶ Og tað bar á í tí ellivta árinum, í hinum fyrsta *mánaðinum,* í hinum sjeynda *degi* mánaðarins, *at* HARRANS orð kom at mær, sigandi,

21 Menniskjusonur, eg havi brotið armin á Pharaoh kongi av Egyptalandi; og sí, hann skal ei verða bundin um til *tess* at verða grøddur, at seta eitt vav til at binda hann, at gera hann sterkan at halda svørðinum.

22 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg *eri* ímóti Pharaoh kongi av Egyptalandi, og vil bróta hans armar, hin sterka, og tað sum var brotið; og eg vil elva svørðinum at falla út úr hans hond.

23 Og eg vil spjaða Egyptarnar millum tjóðanna, og vil spreiða teir ígjøgnum londini.

24 Og eg vil styrkja armarnar hjá kongi Bábylons, og seta mítt svørð í hans hond: men eg vil bróta Pharaohs armar, og hann skal eymka *seg* frammi fyri honum við eymkingunum av einum deyðiliga særdum *manni*.

25 Men eg vil styrkja armarnar hjá kongi Bábylons, og armarnir hjá Pharaoh skulu falla niður; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg skal leggja mítt svørð inn í hondina á kongi Bábylons, og hann skal strekkja tað út omanyvir Egyptaland.

26 Og eg vil spjaða Egyptarnar millum tjóðanna, og spreiða teir millum landanna; og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 31

OG tað bar á í tí ellivta árinum, í tí triðja *mánaðinum,* í hinum fyrsta *degi* mánaðarins, *at* HARRANS orð kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, tala yvirat Pharaoh kongi av Egyptalandi, og til fjøld hansara; Hvørjum ert tú líkur í mikilleika tínum?

3 ¶ Sí, Assýriarin *var* eitt sedris*træ* í Lí´-bă-nŏn við føgrum greinum, og við einum skuggandi skýli, og av eini høgari vakstrarhædd; og hansara toppur var hinna tjúkku bula millum.

4 Vøtnini gjørdu hann miklan, djúpið setti hann upp til hæddar við sínum áum rennandi rundan um hansara plantur, og sendi út sínar lítlu áir at øllum trøum akursins.

5 Tí varð hædd hans upphevjað uppum øll trø akursins, og hansara bulir vórðu margfaldaðir, og hansara greinar gjørdust langar uppá grund av fjøldini av vøtnum, tá ið hann spíraði fram.

6 Allir fuglar himins gjørdu síni reiður í hansara bulum, og undir hansara greinum bóru øll djór akursins fram sínar ungar, og undir hansara skugga dvaldust allar miklar tjóðir.

7 Svá var hann fagur í sínum mikilleika, í longdini av sínum greinum: tí hansara rót var hjá miklum vøtnum.

8 Sedris*trøini* í Guðs aldingarði kundu ikki fjala hann: aðalgranntrøini vóru ikki sum hansara bular, og kastanjutrøini vóru ikki sum hansara greinar; eiheldur var nakað træ í Guðs aldingarði líkt honum í hansara vakurleika.

9 Eg havi gjørt hann fagran við fjøldini av hansara greinum: so at øll trø Edens, sum *vóru* í Guðs aldingarði, øvundaðu hann.

10 ¶ Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at tú hevurt lyft upp teg sjálvan í hædd, og hann hevur skotið upp sín topp hinna tjúkku bula millum, og hansara hjarta er lyft upp í hædd hansara;

11 Eg havi tí flýggjað hann inn í hondina á hinum mektiga hjá hinum heidnu; hann skal vissuliga taka sær av honum: eg havi rikið hann út fyri hansara vondsku.

12 Og fremmandir, tjóðanna ræðuligu, hava skorið hann av, og hava eftirlatið hann: uppiá fjøllunum og í øllum dølunum eru hansara greinar falnar, og hansara bular eru brotnir við allar áir landsins; og øll fólk jarðarinnar eru farin niður frá skugga hansara, og hava eftirlatið hann.

13 Uppiá oyðing hansara skulu allir fuglar himinsins verða verandi, og øll djór akursins skulu vera uppiá hansara greinum:

14 Til tess endamáls, at eingi av øllum trøunum við vøtnini upphevji seg sjálv fyri hædd sína, eiheldur skjóti upp topp sín hinna tjúkku bula millum, eiheldur teirra trø standi upp í síni hædd, øll sum drekka vatn: tí at tey eru øll givin upp at deyða, til hinna niðaru parta jarðarinnar, í miðju mannabarnanna, við teimum ið fara niður til holuna.

15 Svá sigur Harrin GUÐ; Á tí degi, tá ið hann fór niður til gravarinnar, elvdi eg eina harman: eg dekkaði djúpið fyri hann, og eg afturhelt flóðir tess, og hini miklu vøtn vórðu helmað: og eg elvdi Lí´-bă-nŏn at harma um hann, og øll akursins trø ørmaktaðust yvir hann.

16 Eg fekk tjóðirnar at rista við ljóðið av hansara falli, tá ið eg kastaði hann niður til helvitis við teim sum stíga niður inn í holuna: og øll trø Edens, hini úrvals og bestu Lí´-bă-nŏn-s, øll sum drekka vatn, skulu verða uggað í hinum niðaru pørtum jarðarinnar.

17 Tey eisini fóru niður inn í helviti við honum at *teim ið veri seg* vignir við svørðinum; og *teir, ið vóru* armur hansara, *sum* dvaldust undir hansara skugga í miðju hinna heidnu.

18 ¶ Við hvønn ert tú soleiðis líkur í dýrd og í mikilleika millum trø Edens? tó skalt tú verða førdur niður við trøum Edens at hinum niðaru pørtum jarðarinnar: tú skalt liggja í miðju hinna óumskornu við *teimum ið veri seg* vignir viðˆ svørðinum. Hetta *er* Pharaoh og øll hansara múgva, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 32

OG tað bar á í tí tólvta árinum, í tí tólvta mánaðinum, í hinum fyrsta *degi* mánaðarins, *at* orð HARRANS kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, tak upp eitt harmljóð um Pharaoh kong av Egyptalandi, og sig at honum, Tú ert eins og ein ung leyva hjá tjóðunum, og tú *ert* sum ein hvalur í sjógvunum: og tú komst fram við áum tínum, og órógvaðirt vøtnini við fótum tínum, og grumsaðirt áir teirra.

3 Svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil tí breiða út mína nót yvir teg við einum flokki av mongum fólki; og teir skulu føra teg upp í nót míni.

4 Tá vil eg eftirlata teg uppiá landinum, eg vil kasta teg fram uppá hin opna akur, og vil elva øllum fuglum himinsins at verða verandi uppiá tær, og eg vil metta djórˇ alrar jarðarinnar við tær.

5 Og eg vil leggja títt kjøt uppá fjøllini, og fylla dalarnar við hædd tíni.

6 Eg vil eisini vatna við tínum blóði landið, hvarí tú svimurt, *enntá* til fjallanna; og áirnar skulu verða fullar av tær.

7 Og tá ið eg skal koyra teg út, vil eg hylja himinin, og gera stjørnur hansara myrkar; eg vil hylja sólina við einum skýggi, og mánin skal ei geva ljós sítt.

8 Øll bjørtu ljós himins vil eg gera myrk yvir tær, og seta myrkur uppá land títt, sigur Harrin GUÐ.

9 Eg vil eisini níva hjørtuni á mongum fólki, tá ið eg skal føra tína oyðing tjóðanna millum, inn í londini sum tú ei hevurt kent.

10 Ja, eg vil gera mong fólk ovfarin yvir teg, og teirra kongar skulu verða ræðuliga ræddir um teg, tá ið eg skal reiggja mínum svørði frammanfyri teimum; og teir skulu skelva á *hvørjari* stund, hvør maður fyri sínum egna lívi, á deginum av tínum falli.

11 ¶ Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Svørð kongsins av Bábylon skal koma uppá teg.

12 Viðˆ svørðunum hjá teimum mektigu vil eg elva tíni fjøld at falla, tjóðanna ræðuligu, øllum av teimum: og teir skulu herja skrúð Egyptalands, og øll múgvan hjá tí skal verða oydd.

13 Eg vil oyða eisini øll djórini hjá tí frá við lið hinna miklu vatna; eiheldur skal fótur mans órógva tey meira, ella hógvarnir hjá djórum órógva tey.

14 Tá vil eg gera teirra vøtn djúp, og elva teirra áum at renna sum olja, sigur Harrin GUÐ.

15 Tá ið eg skal gera Egyptaland oyði, og landið skal vera á berum fyri tí - við hvørjum tað var fult, tá ið eg skal sláa allar teir sum búgva harí, tá skulu teir vita, at eg *eri* HARRIN.

16 Hetta *er* harmljóðið, hvarvið tær skulu harma hana: tjóðanna døtur skulu harma hana: tær skulu harma yvir hana, *enntá* yvir Egyptaland, og yvir alla hennara múgvu, sigur Harrin GUÐ.

17 ¶ Tað bar á eisini í tí tólvta árinum, í hinum fimtanda *degi* mánaðarins, *at* HARRANS orð kom at mær, sigandi,

18 Menniskjusonur, grát yvir Egyptalands múgvu, og kasta tey niður, *enntá* hana, og døtur hinna navngitnu tjóða, at hinum niðaru pørtum jarðarinnar, við teimum sum fara niður inn í holuna.

19 Hvønn fert tú framum í vakurleika? far niður, og vert tú løgd við hinum óumskornu.
20 Teir skulu falla í miðjum *teimum sum eru* vignir viðˆ svørðinum: hon er avhandað til svørðið: dragið hana og allar hennara múgvur.
21 Hinir sterku teirra mektigu millum skulu tala til hansara út úr miðjum helviti við teimum ið hjálpa honum: teir eru farnir niður, teir liggja óumskornir, vignir viðˆ svørðinum.
22 Ássj´-ŭr *er* har og allur hansara flokkur: hansara gravir *eru* um hann: allir av teimum vignir, falnir viðˆ svørðinum:
23 Hvørs gravir eru settar í síðunum av holuni, og hennara flokkur er rundan um hennara grøv: allir av teimum vignir, falnir viðˆ svørðinum, sum voldu ræðslu í landi teirra livandi.
24 Har *er* Ē´-lăm og øll hennara múgva rundan um hennara grøv, allir av teimum vignir, falnir viðˆ svørðinum, sum eru farnir niður óumskornir inn í hinar niðaru partar jarðarinnar, sum voldu sína ræðslu í landi teirra livandi; tó hava teir borið sína skomm við teimum ið fara niður til holuna.
25 Teir hava sett henni eina song í miðjuni av hinum vignu við allari hennara múgvu: hennara gravir *eru* rundan um hann: allir av teimum óumskornir, vignir viðˆ svørðinum: tó *at* teirra ræðsla varð vold í landi teirra livandi, tó hava teir borið sína skomm við teimum ið fara til holuna: hann er settur í miðjuna av *teimum ið veri seg* vignir.
26 Har *er* Mē´-sjĕch, Tū´-băl, og øll hennara múgva: hennara gravir *eru* rundan um hann: allir av teimum óumskornir, vignir viðˆ svørðinum, tó *at* teir voldu sína ræðslu í landi teirra livandi.
27 Og teir skulu ikki liggja hjá hinum mektigu *sum eru* falnir av hinum óumskornu, sum eru farnir niður til helvitis við sínum krígsvápnum: og teir hava lagt síni svørð undir síni høvur, men teirra misgerðir skulu vera uppiá teirra beinum, tó *at teir vóru* ræðslan hjá hinum mektigu í landi teirra livandi.
28 Ja, tú skalt verða brotin í miðju hinna óumskornu, og skalt liggja hjá *teimum ið eru* vignir viðˆ svørðinum.
29 Har *er* Ē´-dóm, hennara kongar, og allir hennara prinsar, sum við sínum mátti eru lagdir hjá *teimum ið vórðu* vignir viðˆ svørðinum: teir skulu liggja hjá hinum óumskornu, og hjá teimum ið fara niður til holuna.
30 Har *veri* prinsar norðursins, allir av teimum, og allir Zī-dō´-nĭ-ararnir, sum eru farnir niður við hinum vignu; við síni ræðslu teir skammast um sína megi; og teir liggja óumskornir við *teimum ið veri seg* vignir viðˆ svørðinum, og bera sína skomm við teimum ið fara niður til holuna.
31 Pharaoh skal síggja teir, og skal verða uggaður um alla sína múgvu, *enntá* Pharaoh og allur hans herur vignir viðˆ svørðinum, sigur Harrin GUÐ.
32 Tí at eg havi volt mína ræðslu í landi teirra livandi: og hann skal verða lagdur í miðju hinna óumskornu við *teimum ið eru* vignir við svørðinum, *enntá* Pharaoh og øll hansara múgva, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 33

AFTUR kom orð HARRANS at mær, sigandi,
2 Menniskjusonur, tala til barna fólks tíns, og sig við teir, Tá ið eg føri svørðið uppá eitt land, um fólk landsins taki ein mann út úr breddum sínum, og seti hann til sín varðmann:

3 Um, tá ið hann sær svørðið koma uppá landið, hann blási lúðurin, og ávari fólkið;
4 Tá hvørsumhelst *ið* hoyrir ljóðið av lúðrinum, og tekur ikki *við* ávaring; um svørðið komi, og taki hann burt, hansara blóð skal vera uppiá hans egna høvdi.
5 Hann hoyrdi ljóðið av lúðrinum, og tók ikki *við* ávaring; hansara blóð skal vera uppiá honum. Men hann, sum tekur *við* ávaring, skal bjarga sál síni.
6 Men um varðmaðurin síggi svørðið koma, og blási ikki lúðurin, og fólkið verði ikki ávarað; um svørðið komi, og taki *nakran* persón teirra millum ífrá, er hann tikin burt í síni misgerð; men hansara blóð vil eg krevja av varðmansins hond.
7 ¶ So tú, O menniskjusonur, eg havi sett teg ein varðmann hjá húsi Ísraels; tí skalt tú hoyra orðið av munni mínum, og ávara teir frá mær.
8 Tá ið eg sigi við hin vonda, O vondi *maður,* tú skalt vissuliga doyggja; um tú talart ikki til at ávara hin vonda frá hansara vegi, skal hasin vondi *maðurin* doyggja í síni misgerð; men hansara blóð vil eg krevja av tíni hond.
9 Hóast hetta, um tú ávari hin vonda um hansara veg at venda frá honum; um hann vendi ikki frá sínum vegi, skal hann doyggja í síni misgerð; men tú hevurt útfríað tína sál.
10 Tessvegna, O tú menniskjusonur, tala yvirat Ísraels húsi; Tit tala svá, sigandi, Um okkara misbrot˘ og okkara syndir *veri* uppiá okkum, og vit fáni burtur í teim, hvussu skuldu vit tá livað?
11 Sig yvirat teimum, *Sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, eg havi onga fragd í deyðanum hjá tí vonda; men at hin vondi vendi frá sínum vegi og livi: vendið tit, vendið tit frá tykkara illu vegum; tí at hví vilja tit doyggja, O Ísraels hús?
12 Tessvegna, tú menniskjusonur, sig yvirat børnum fólks tíns, Rættvísin hjá tí rættvísa skal ikki bjarga honum á deginum av hansara misbroti: hvat viðvíkur vondskuni hjá tí vonda, hann skal ikki falla harviðˆ á tí degi sum hann vendir frá síni vondsku; eiheldur skal hin rættvísi vera førur fyri at liva vegna sína *rættvísi* á tí degi sum hann syndar.
13 Tá ið eg skal siga til hin rættvísa, *at* hann skal vissuliga liva; um hann troysti til sína egnu rættvísi, og fremji misgerð, skulu allar hansara rættvísir ikki verða mintar; men fyri hansara misgerð, sum hann hevur framt, hann skal doyggja fyri hana.
14 *Upp*aftur, tá ið eg sigi við hin vonda, Tú skalt vissuliga doyggja; um hann vendi frá síni synd, og geri tað sum er lógligt og rætt;
15 *Um* hin vondi endurbøti veðhaldið, gevi aftur tað hann hevði rænt, gangi í ásetingum lívsins, uttan at fremja misgerð; hann skal vissuliga liva, hann skal ikki doyggja.
16 Eingin av hansara syndum, sum hann hevur framt, skal verða nevnd honum: hann hevur gjørt tað sum er lógligt og rætt; hann skal vissuliga liva.
17 ¶ Tó siga børn fólks tíns, Vegur Harrans er ikki rættur: men hvat teimum viðvíkur, teirra vegur er ikki rættur.
18 Tá ið hin rættvísi vendir frá síni rættvísi, og fremur misgerð, hann skal enntá doyggja harviðˆ.
19 Men um hin vondi vendi frá síni vondsku, og geri tað sum er lógligt og rætt, hann skal liva harviðˆ.
20 ¶ Tó siga tit, Vegur Harrans er ikki rættur. O tit Ísraels hús, eg vil døma tykkum hvønn *og* ēin eftir vegum hans.

21 ¶ Og tað bar á í tí tólvta árinum av okkara fangaskapi, í hinum tíggjunda *mánaði,* í hinum fimta *degi* mánaðarins, *at* ēin, sum hevði komist undan út úr Jerusalem, kom at mær, sigandi, Staðurin er sligin.

22 Nú, HARRANS hond var uppiá mær um kvøldið, áðrenn hann, sum hevði komist undan, kom; og hevði opnað mín munn, inntil hann kom til mín um morgunin; og mín munnur varð opnaður, og eg var ei meira málleysur.

23 Tá kom orð HARRANS at mær, sigandi,

24 Menniskjusonur, teir, sum búgva í hasum toftum Ísraels lands, tala, sigandi, Ábraham var ēin, og hann arvaði landið: men vit *eru* mangir; landið er givið okkum til arvs.

25 Hvørsvegna sig við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Tit eta við blóðinum, og lyfta upp eygum tykkara mótvegis avgudum tykkara, og úthella blóð: og skulu tit eiga landið?

26 Tit standa uppá tykkara svørð, tit virka andstygd, og tit dálka hvør *og* ēin ektakonu næsta síns: og skulu tit eiga landið?

27 Sig tú svá við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; *Sum* eg livi, vissuliga, teir, sum *eru* í toftunum, skulu falla við svørðinum, og hann, sum *er* í tí opna akrinum, vil eg geva til djórini at verða uppgloyptur, og teir, ið *veri seg* í festningunum og í hellunum, skulu doyggja av drepsóttini.

28 Tí at eg vil leggja landið mest oyði, og skrúðið av hennara styrki skal halda uppat; og Ísraels fjøll skulu verða oyðin, at eingin skal fara ígjøgn.

29 Tá skulu teir vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg havi lagt landið mest oyði uppá grund av øllum teirra andstygdum sum teir hava framt.

30 ¶ Eisini, tú menniskjusonur, børn fólks tíns enn tala ímóti tær við múrarnar og í durunum av húsunum, og tala hvør til annars, hvør *og* ēin til bróður síns, sigandi, Komið, eg biði tykkum, og hoyrið hvat er orðið sum kemur fram frá HARRANUM.

31 Og teir koma at tær eins og fólkið kemur, og teir sita frammi fyri tær *sum* fólk mítt, og teir hoyra orð tíni, men teir vilja ikki gera tey: tí at við sínum munni teir sýna nógvan kærleika, *men* teirra hjarta fer eftir teirra havisjúku.

32 Og sí, tú *ert* teimum eins og ein sera yndisligur sangur av ēinum sum hevur eina dámliga rødd, og dugir *at* spæla væl á eitt ljóðføri: tí at teir hoyra tíni orð, men teir gera tey ikki.

33 Og tá ið hetta ber á, (sí, tað vil koma,) tá skulu teir vita, at ein prophetur hevur verið teirra millum.

KAPITUL 34

OG HARRANS orð kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, prophetera ímóti hirðum Ísraels, prophetera, og sig at teimum, Svá sigur Harrin GUÐ at hirðunum; Vei *veri* til hirðanna av Ísrael sum føða seg sjálvar! skuldu ikki hirðarnir føða fylgini?

3 Tit eta hitt feita, og tit klæða tykkum við ullini, tit drepa teir sum er mataðir: *men* tit føða ikki fylgið.

4 Tað sjúkufongda hava tit ikki styrkt, eiheldur hava tit grøtt tað sum var sjúkt, eiheldur hava tit bundið um *tað sum var* brotið, eiheldur hava tit ført aftur tað sum var rikið burt, eiheldur hava tit søkt tað sum var burturvilst; men við makt og við grimd hava tit stjórnað teimum.

5 Og teir vórðu spjaddir, av tí at eingin hirði *er:* og teir gjørdust

matur hjá øllum djórum akursins, tá ið teir vórðu spjaddir.

6 Mín seyður reikaði ígjøgnum øll fjøllini, og uppiá hvørjum høgum heyggi: ja, mítt fylgi var spjatt uppiá allari ásjón jarðarinnar; og eingin kannaði ella søkti *eftir teimum*.

7 ¶ Tessvegna, tit hirðar, hoyrið HARRANS orð;

8 *Sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, vissuliga, av tí at mítt fylgi gjørdist ein bráð, og mítt fylgi gjørdist matur hjá hvørjum djóri akursins, av tí at eingin hirði *var,* eiheldur søktu mínir hirðar eftir fylgi mínum, men hirðarnir føddu seg sjálvar, og føddu ikki fylgi mítt;

9 Tessvegna, O tit hirðar, hoyrið HARRANS orð;

10 Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg *eri* ímóti hirðunum; og eg vil krevja mítt fylgi av teirra hond, og volda teimum at halda uppat frá at føða fylgið; eiheldur skulu hirðarnir føða seg sjálvar meira; tí at eg vil útfría mítt fylgi frá teirra munni, at teir mega ei vera matur hjá teimum.

11 ¶ Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg, *enntá* eg, vil bæði leita *eftir* seyði mínum, og søkja teir upp.

12 Eins og ein hirði søkir upp fylgi sítt á tí degi sum hann er millum seyð sín *sum eru* spjaddir; so vil eg søkja upp seyð mín, og vil útfría teir út úr øllum plássum, har teir hava verið spjaddir í tí skýggjuta og myrka deginum.

13 Og eg vil føra teir út frá fólkinum, og savna teir frá londunum, og vil føra teir til teirra egna land, og føða teir uppiá Ísraels fjøllum við áirnar, og í øllum teimum íbúnu plássunum av landinum.

14 Eg vil føða teir í einum góðum beiti, og uppiá hinum høgu fjøllum Ísraels skal teirra byrgi vera: har skulu teir liggja í einum góðum byrgi, og *í* einum feitum beiti skulu teir beitast uppiá fjøllum Ísraels.

15 Eg vil føða fylgi mítt, og eg vil elva teimum at leggjast niður, sigur Harrin GUÐ.

16 Eg vil søkja tað sum var burturvilst, og føra aftur tað sum var burturrikið, og vil binda um *tað sum var* brotið, og vil styrkja tað sum var sjúkt: men eg vil oyðileggja tað feita og tað sterka; eg vil føða teir við dómi.

17 Og *hvat viðvíkur* tykkum, O fylgi mítt, svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg dømi ímillum fenað og fenað, ímillum veðrarnar og havrarnar.

18 *Tykist tað* tykkum eitt lítið ting at hava etið upp hitt góða beiti, uttan *at* tit mugu traðka niður við tykkara fótum hitt eftirverandi av beitum tykkara? og at hava drukkið av hinum djúpu vøtnum, uttan *at* tit mugu grugga hitt eftirverandi við fótum tykkara?

19 Og *hvat viðvíkur* mínum fylgi, teir eta tað sum tit hava traðkað við fótum tykkara; og teir drekka tað sum tit hava gruggað við fótum tykkara.

20 ¶ Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ við teir; Sí, eg, *enntá* eg, vil døma ímillum hin feita fenað og ímillum hin soltna fenað.

21 Av tí at tit hava stoytt við lið og við øksl, og trýst allar teir sjúkufongdu við hornum tykkara, til tit hava spjatt teir útumkring;

22 Tí vil eg frelsa fylgi mítt, og teir skulu ei meira vera ein fongur; og eg vil døma ímillum fenað og fenað.

23 Og eg vil seta upp ēin hirða yvir teimum, og hann skal føða teir, *enntá* tænara mín Dávid; hann skal føða teir, og hann skal vera hirði teirra.

24 Og eg HARRIN vil vera Guð teirra, og mín tænari Dávid ein prinsur teirra millum; eg HARRIN havi talað *tað*.

25 Og eg vil gera við teir ein friðarsáttmála, og vil elva teimum óndu djórunum at halda uppat burtur úr landinum: og teir skulu búgva tryggligani í oyðuni, og sova í skógunum.
26 Og eg vil gera teir og plássini runt um heyg mín *til* eina signing; og eg vil elva skúrinum at koma niður í tíð síni; vera skulu skúrir av signing.
27 Og akursins træ skal veita ávøkst sín, og jørðin skal veita gróði sína, og teir skulu vera tryggir í landi sínum, og skulu vita at eg *eri* HARRIN, tá ið eg havi brotið bond oks teirra, og útfríað teir út úr hondini á teimum sum tæntu sær sjálvum av teimum.
28 Og teir skulu ei meira vera ein bráð hjá hinum heidnu, eiheldur skulu landsins djór upptæra teir; men teir skulu búgva tryggliga, og eingin skal gera *teir* ræddar.
29 Og eg vil reisa upp fyri teir eina navngitnis plantu, og teir skulu verða ei meira upptærdir við hungri í landinum, eiheldur bera skomm teirra heidnu meira.
30 Svá skulu teir vita, at eg HARRIN Guð teirra *eri* við teimum, og *at* teir, *enntá* hús Ísraels, *eru* fólk mítt, sigur Harrin GUÐ.
31 Og tit, fylgi mítt, fylgi beitis míns, *eru* menn, *og* eg *eri* Guð tykkara, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 35

HARAFTURAT kom orð HARRANS at mær, sigandi,
2 Menniskjusonur, set andlit títt ímóti Sē´-ir fjalli, og prophetera ímóti tí,
3 Og sig við tað, Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, O Sē´-ir fjall, eg *eri* ímóti tær, og eg vil strekkja út mína hond ímóti tær, og eg vil gera teg mest oyði.
4 Eg vil leggja tínar staðir *í* oyði, og tú skalt vera avtoftað, og tú skalt vita, at eg *eri* HARRIN.
5 Av tí at tú hevurt havt eitt viðvarandi hatur, og hevurt úthelt *blóðið av* børnum Ísraels við kraft svørðsins í tíðini av teirra skaðatilburði, í tíðini *sum teirra* misgerð *fekk* ein enda:
6 Tessvegna, *sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, eg vil fyribúgva teg at blóði, og blóð skal elta teg: síðan tú hevurt ikki hatað blóð, skal enntá blóð elta teg.
7 Svá vil eg gera Sē´-ir fjall mest oyði, og skera av frá tí hann sum fer út, og hann sum vendir aftur.
8 Og eg vil fylla hansara fjøll við hansara vignu *monnum:* á heyggjum tínum, og í dølum tínum, og í øllum áum tínum, skulu teir falla sum eru vignir við svørðinum.
9 Eg vil gera teg *til* viðvarandi oyðingar, og tínir staðir skulu ikki koma aftur: og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.
10 Av tí at tú hevurt sagt, Hesar tvær tjóðir og hesi tvey lond skulu vera míni, og vit vilja eiga tað; hvar ið HARRIN var har:
11 Tessvegna, *sum* eg livi, sigur Harrin GUÐ, eg vil enntá gera samsvarandi við tína firtni, og samsvarandi við tína øvund sum tú hevurt brúkt úr tínum hatri ímóti teimum; og eg vil gera meg sjálvan kunnan teirra millum, tá ið eg havi dømt teg.
12 Og tú skalt vita, at eg *eri* HARRIN, *og at* eg havi hoyrt allar tínar halgispottanir sum tú hevurt talað ímóti fjøllum Ísraels, sigandi, Tey eru løgd *í* oyði, tey eru givin okkum til at upptæra.
13 Svá við tykkara munni hava tit reypað ímóti mær, og hava margfaldað tykkara orð ímóti mær: eg havi hoyrt *tey*.
14 Svá sigur Harrin GUÐ; Tá ið øll jørðin fegnast, vil eg gera teg oyði.
15 Eins og tú fegnaðirst yvir arvin hjá Ísraels húsi, av tí at tað

var oyði, soleiðis vil eg gera við teg: tú skalt vera oyði, O Sē´-ïr fjall, og alt Ï-dû-mē´-ă, *enntá* alt *sum* tað er: og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 36

EISINI, tú menniskjusonur, prophetera at fjøllum Ísraels, og sig, Tit fjøll Ísraels, hoyrið orð HARRANS:

2 Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at figgindin hevur sagt ímóti tykkum, Há, enntá hini elligomlu høgu pláss eru okkar í ogn:

3 Tessvegna prophetera og sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at teir hava gjørt *tykkum* oyðin, og svølgt tykkum upp á hvørjari síðu, at tit máttu vera hinum eftirverandi av hinum heidnu ein ogn, og tit eru tikin upp í varrarnar á tosarum, og *eru* ein útspilling hjá fólkinum:

4 Tessvegna, tit fjøll Ísraels, hoyrið orð Harrans GUÐS; Svá sigur Harrin GUÐ til fjøllini, og til heyggjarnar, til áirnar, og til dalarnar, til hinar oydnu oyður, og til staðirnar sum eru yvirgivnir, sum gjørdust ein fongur og *ein* speireking fyri tí eftirverandi av hinum heidnu sum *eru* rundan um;

5 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Vissuliga, í eldinum av míni ástbrelni havi eg talað ímóti tí eftirverandi av hinum heidnu, og ímóti allari Ï-dû-mē´-ū, sum hava útnevnt mítt land inn í sítt ognarhald við frøini av øllum *sínum* hjarta, við illnatnisfullum hugum, til at kasta tað út til ein fong.

6 Prophetera tí viðvíkjandi landi Ísraels, og sig við fjøllini, og til heyggjarnar, og til áirnar, og til dalarnar, Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg havi talað í míni ástbrelni og í míni øði, av tí at tit hava borið skomm teirra heidnu:

7 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Eg havi lyft upp mína hond, Vissuliga, hinir heidnu, sum *eru* kring tykkum, teir skulu bera skomm sína.

8 ¶ Men tit, O fjøll Ísraels, tit skulu skjóta fram greinar tykkara, og veita tykkara ávøkst til fólks míns Ísraels; tí at teir eru fyri hond at koma.

9 Tí at sí, eg *eri* fyri tykkum, og eg vil venda at tykkum, og tit skulu verða velt og sáað:

10 Og eg vil margfalda menn uppiá tykkum, alt hús Ísraels, *enntá* alt *sum* tað er: og staðirnir skulu verða íbúnir, og toftirnar skulu verða bygdar:

11 Og eg vil margfalda uppiá tykkum mann og djór; og tey skulu taka til og bera ávøkst: og eg vil støða tykkum eftir tykkara gomlu støðum, og vil gera betri *at tykkum* enn við tykkara byrjanir: og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

12 Ja, eg vil elva monnum at ganga uppiá tykkum, *enntá* fólki mínum Ísrael; og teir skulu eiga teg, og tú skalt vera teirra arvur, og tú skalt ei meira hiðanífrá fráræna teir *fyri menn*.

13 Svá sigur Harrin GUÐ; Av tí at teir siga við teg, Tú *land* gloypirt upp menn, og hevurt frárænt tínar tjóðir;

14 Tí skalt tú gloypa menn ei meira, eiheldur fráræna tjóðir tínar meira, sigur Harrin GUÐ.

15 Eiheldur vil eg elva *monnum* at hoyra í tær skomm teirra heidnu meira, eiheldur skalt tú bera skemd fólksins meira, eiheldur skalt tú elva tínum tjóðum at falla meira, sigur Harrin GUÐ.

16 ¶ Harafturat kom orð HARRANS at mær, sigandi,

17 Menniskjusonur, tá ið Ísraels hús búði í sínum egna landi, dálkaðu teir tað við sínum egna vegi og við sínum gerningum: teirra vegur var frammi fyri mær sum óreinskan hjá eini burtfluttari kvinnu.

18 Hvørsvegna eg helti mína
øði uppá teir fyri tað blóð sum
teir høvdu helt omanyvir landið;
og fyri teirra avgudar, *hvarvið*
teir høvdu óreinskað tað:
19 Og eg spjaddi teir hinna heid-
nu millum, og teir vórðu spreiddir
ígjøgnum londini: samsvarandi
við teirra veg og samsvarandi við
teirra gerðir dømdi eg teir.
20 Og tá ið teir innfóru at
hinum heidnu, hvagar teir fóru,
tá halgispottaðu teir mítt heilaga
navn, tá ið teir søgdu til teirra,
Hesir *eru* fólk HARRANS, og eru
farnir fram út úr landi hans.
21 ¶ Men eg hevði samkenslu
fyri mítt heilaga navn, sum Ís-
raels hús hevði halgispottað hinna
heidnu millum, hvagar teir fóru.
22 Tessvegna sig yvirat Ísraels
húsi, Svá sigur Harrin GUÐ; Eg
geri ikki *hetta* fyri tykkara sakir,
O hús Ísraels, men fyri heilaga
navns míns skuld, hvørt tit hava
halgispottað hinna heidnu mill-
um, hvagar tit fóru.
23 Og eg vil halga mítt mikla
navn,sum varð halgispottað hinna
heidnu millum, hvørt tit hava
halgispottað í miðjum teimum;
og hinir heidnu skulu vita, at eg
eri HARRIN, sigur Harrin GUÐ, tá
ið eg skal verða halgaður í tykkum
frammi fyri eygum teirra.
24 Tí eg vil taka tykkum hinna
heidnu millum ífrá, og savna
tykkum út úr øllum londum, og
vil føra tykkum inn í egna land
tykkara.
25 ¶ Tá vil eg sletta reint vatn
uppá tykkum, og tit skulu verða
reinir: frá øllum tykkara grav-
skitinleika, og frá øllum tykkar
avgudum, vil eg reinsa tykkum.
26 Eitt nýtt hjarta eisini vil eg
geva tykkum, og ein nýggjan anda
vil eg leggja innan í tykkum: og
eg vil taka burt tað steinuta hjarta
út úr kjøti tykkara, og eg vil geva
tykkum eitt hjarta av kjøti.
27 Og eg vil leggja mín anda
innan í tykkum, og elva tykkum
at ganga í mínum ásetingum, og
tit skulu halda mínar dómar, og
gera *teir*.
28 Og tit skulu búgva í land-
inum sum eg gav til tykkara fedr-
ar; og tit skulu vera fólk mítt, og
eg vil vera Guð tykkara.
29 Eg vil eisini frelsa tykkum
frá allari óreinsku tykkara: og eg
vil kalla eftir korninum, og vil økja
tað, og onga hungursneyð leggja
uppá tykkum.
30 Og eg vil margfalda ávøkst
træsins, og gróðurin av akrinum,
at tit skulu móttaka onga meira
skemd av hungursneyð millum
hinna heidnu.
31 Tá skulu tit minnast tykkar
egnu illu vegir, og tykkara gerðir
sum *vóru* ikki góðar, og skulu
vamlast við tykkum sjálvar í tykk-
ar egnu eygsjón fyri tykkara mis-
gerðir og fyri tykkar andstygdir.
32 Ikki fyri tykkara sakir geri
eg *hetta,* sigur Harrin GUÐ; veri
tað kunnigt tykkum: skammist og
fjamskist fyri tykkar egnu vegir,
O Ísraels hús.
33 Svá sigur Harrin GUÐ; Á
tí degi sum eg skal hava reinsað
tykkum frá øllum tykkara mis-
gerðum, vil eg eisini elva *tykkum*
at búgva í staðunum, og toftirnar
skulu verða bygdar.
34 Og hitt oydna land skal
verða velt, hvar ið tað lá oyði í
eygsjón alra sum fóru framvið.
35 Og teir skulu siga, Hetta
landið, sum var oyði, er vorðið
líka *sum* Edens aldingarður; og
hinir toftaðu og oydnu og oyði-
løgdu staðir *eru vorðnir* girdir, *og*
eru íbúnir.
36 Tá skulu teir heidnu, sum
eru eftir rundan um tykkum, vita,
at eg HARRIN byggi hini oyddu
pláss, og planti tað sum var oyði:
eg HARRIN havi talað *tað,* og eg
vil gera *tað*.

37 Svá sigur Harrin GUÐ; Eg vil enn *fyri* hetta verða fregnaður av av húsi Ísraels, at gera *tað* fyri teir; eg vil økja teir við monnum sum eitt fylgi.

38 Eins og hitt heilaga fylgi, eins og fylgi Jerusalems í hennara hátíðar-veitslum; soleiðis skulu hinir oydnu staðir verða fyltir við fylgjum av monnum: og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 37

HOND HARRANS var uppiá mær, og bar meg út í anda HARRANS, og setti meg niður í miðjum dalinum sum *var* fullur av beinum,

2 Og voldi mær at fara framvið teimum runt umkring: og sí, *tað vóru* sera mong í tí opna dalinum; og sí, *tey vóru* sera turr.

3 Og hann segði við meg, Menniskjusonur, kunnu hesi bein liva? Og eg svaraði, O Harri GUÐ, tú veitst.

4 Aftur segði hann við meg, Prophetera omanyvir hesi bein, og sig yvirat teimum, O tit turru bein, hoyrið HARRANS orð.

5 Svá sigur Harrin GUÐ við hesi bein; Sí, eg vil elva andadrátti at innfara inn í tykkum, og tit skulu liva:

6 Og eg vil leggja sinar uppá tykkum, og vil føra upp kjøt uppá tykkum, og dekka tykkum við húð, og koyra andadrátt í tykkum, og tit skulu liva; og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

7 So eg propheteraði sum mær varð áboðið: og, sum eg propheteraði, varð eitt ljóð, og sí ein risting, og beinini komu saman, bein til bein hans.

8 Og tá ið eg skoðaði, sí, sinarnar og kjøtið komu upp uppá tey, og húðin dekkaði tey í erva: men *tað var* eingin andadráttur í teimum.

9 Tá segði hann við meg, Prophetera at vindinum, prophetera, menniskjusonur, og sig til vindin, Svá sigur Harrin GUÐ; Kom frá hinum fýra vindum, O andadráttur, og anda uppá hesar vignu, at teir mega liva.

10 So eg propheteraði eins og hann ábeyð mær, og andadráttur-in kom inn í teir, og teir livdu, og stóðu upp uppá sínar føtur, ein ovurhonds mikil herur.

11 ¶ Tá segði hann við meg, Menniskjusonur, hesi bein eru heila hús Ísraels: sí, teir siga, Vári bein eru turkað, og okkara vón er mist: vit eru skornir av fyri okkara partar.

12 Tessvegna prophetera og sig at teimum, Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, O fólk mítt, eg vil opna gravir tykkara, og elva tykkum at koma upp út úr gravum tykkara, og føra tykkum inn í land Ísraels.

13 Og tit skulu vita, at eg *eri* HARRIN, tá ið eg havi opnað gravir tykkara, O fólk mítt, og ført tykkum upp út úr gravum tykkara,

14 Og skal koyra mín anda í tykkum, og tit skulu liva, og eg skal staðseta tykkum í egna land tykkara: tá skulu tit vita, at eg HARRIN havi talað *tað,* og útint *tað,* sigur HARRIN.

15 ¶ HARRANS orð kom aftur at mær, sigandi,

16 Harafturat, tú menniskjusonur, tak tær ēin kvist, og skriva uppá hann, Fyri Judah, og fyri Ísraels børn hansara felagar: síðan tak ein annan kvist, og skriva uppá hann, Fyri Jóseph, Ē´-phrăim-s kvist, og *fyri* alt hús Ísraels hansara felagar:

17 Og sameina teir hvør til annan í ēin kvist; og teir skulu gerast ēin í hond tíni.

18 ¶ Og tá ið børn fólks tíns skulu tala yvirat tær, sigandi, Vilt tú ikki sýna okkum hvat tú *meinart* við hesum˘?

19 Sig við teir, Svá sigur

Harrin GUÐ; Sí, eg vil taka kvist Jósephs, sum *er* í hond Ē´-phrăĭm-s, og ættargreinir Ísraels hansara felagar, og vil seta teir við honum, *enntá* við kvisti Judah, og gera teir *til* ēin kvist, og teir skulu vera ēin í hond míni.

20 ¶ Og kvistarnir, hvará tú skrivart, skulu vera í tíni hond frammi fyri eygum teirra.

21 Og sig við teir, Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg vil taka børn Ísraels hinna heidnu millum ífrá, hvagar teir veri farnir, og vil savna teir á hvørjari síðu, og føra teir inn í egna land teirra:

22 Og eg vil gera teir *til* ēina tjóð í landinum uppiá fjøllum Ísraels; og ēin kongur skal vera kongur fyri teim øllum: og teir skulu vera ei meira tvær tjóðir, eiheldur skulu teir vera sundurdeildir í tvey kongadømir meira yvirhøvur:

23 Eiheldur skulu teir dálka seg sjálvar meira við sínum avgudum, ella við sínum ótespiligu tingum, ella við nøkrum av sínum misbrotum: men eg vil frelsa teir burtur úr øllum teirra býlum, í hvørjum teir hava syndað, og vil reinsa teir: so skulu teir vera fólk mítt, og eg vil vera Guð teirra.

24 Og Dávid, tænari mín, *skal vera* kongur yvir teimum; og teir allir skulu hava ēin hirða: teir skulu eisini ganga í mínum dómum, og geva ans eftir mínum ásetingum, og gera tey.

25 Og teir skulu búgva í landinum sum eg havi givið Jákobi mínum tænara, í hvørjum tykkara fedrar hava búð; og teir skulu búgva harí, *enntá* teir, og teirra børn, og teirra barnabørn um ævir: og mín tænari Dávid *skal vera* teirra prinsur um ævir.

26 Harafturat vil eg gera ein friðarsáttmála við teir; hann skal vera ein ævigtvarandi sáttmáli við teir: og eg vil staðseta teir, og margfalda teir, og vil seta mín halgidóm í miðjum teimum um ævirmeir.

27 Mítt tabernakkul eisini skal vera hjá teimum: ja, eg vil vera Guð teirra, og teir skulu vera fólk mítt.

28 Og hinir heidnu skulu vita, at eg HARRIN halgi Ísrael, tá ið mín halgidómur skal vera í miðjum teimum um ævirmeir.

KAPITUL 38

OG HARRANS orð kom at mær, sigandi,

2 Menniskjusonur, set títt andlit ímóti Gôg, landi Má´-gŏg-s, tí fremsta prinsinum av Mē´-sjĕch og Tū´-băl, og prophetera ímóti honum,

3 Og sig, Svá sigur Harrin GUÐ; Sí, eg *eri* ímóti tær, O Gôg, tí fremsta prinsinum av Mē´-sjĕch og Tū´-băl:

4 Og eg vil venda tær tilbakar, og koyra húkar inn í tínar kjálkar, og eg vil føra teg út, og allan tín her, hestar og hestmenn, allir av teimum klæddir við alskyns *herbúnaði, enntá* ein miklan flokk *við* smáskjøldrum og skjøldrum, allir av teimum handfarandi svørð´:

5 Persia, Ē-thĭ-ō´-pĭ-ă, og Lĭ´-bў-a við teimum; allir av teimum við skjøldri og hjálmi:

6 Gō´-mĕr, og øll hansara lið; Tō-găr´-măh hús úr norður *heraðs*hornunum, og øll hansara lið: *og* nógv fólk við tær.

7 Vert tú fyrireikaður, og fyrireika til tín sjálvs, tú, og allur tín flokkur sum eru savnaðir at tær, og vert tú ein vørður at teimum.

8 ¶ Eftir mangar dagar skalt tú verða heimsøktur: í teimum seinnu árunum skalt tú koma inn í landið *sum er* ført tilbakar frá svørðinum, *og er* savnað burtur úr nógvum fólki, ímóti Ísraels fjøllum sum hava verið altíð oyðin: men tað er ført fram burtur úr

tjóðunum, og teir skulu búgva tryggligani allir av teimum.

9 Tú skalt stíga upp og koma sum ein stormur, tú skalt vera sum eitt skýggj til at dekka landið, tú, og øll tíni lið, og nógv fólk við tær.

10 Svá sigur Harrin GUÐ; Tað skal eisini bera á, *at* á hini somu tíð skulu ting koma inn í tín huga, og tú skalt hugsa eina illa hugsan:

11 Og tú skalt siga, Eg vil fara niðan til landið av ómúraðum bygdum; eg vil fara til teirra sum eru í hvílu, sum búgva tryggliga, allir av teimum búgvandi uttan múrar, og havandi hvørki lokur ella portur̆,

12 At taka ein herfong, og at taka eina bráð; at venda tíni hond uppá hini oydnu pláss *sum nú eru* búð í, og uppá fólkið *sum eru* savnaði út úr tjóðunum, sum hava fingið fenað og góðs, sum búgva í miðjum landinum.

13 Sjē´-bą, og Dē´-dăn, og handilsmenninir úr Tarsjisj, við øllum ungu leyvum tess, skulu siga við teg, Ert tú komin at taka ein herfong? hevurt tú savnað tín flokk til at taka eina bráð? at bera burtur silvur og gull, at taka burtur fenað og góðs, at taka ein miklan herfong?

14 ¶ Tessvegna, menniskjusonur, prophetera, og sig at Gôg, Svá sigur Harrin GUÐ; Á tí degi tá ið mítt Ísraels fólk býr tryggliga, skalt tú ikki vita *tað?*

15 Og tú skalt koma frá tínum plássi úr norður pørtunum, tú, og nógv fólk við tær, allir av teimum ríðandi uppiá hestum, ein mikil flokkur, og ein mikil herur:

16 Og tú skalt koma niðan ímóti mínum Ísraels fólki, sum eitt skýggj til at dekka landið; tað skal verða í teimum seinnu døgunum, og eg vil føra teg ímóti landi mínum, at hinir heidnu mega kenna meg, tá ið eg skal verða halgaður í tær, O Gôg, frammi fyri eygum teirra.

17 Svá sigur Harrin GUÐ; *Ert* tú hann, um hvønn eg havi talað í gamlari tíð við tænarum mínum, prophetum Ísraels, sum prophteraðu í teimum døgum *mong* ár, at eg vildi føra teg ímóti teimum?

18 Og tað skal bera á við hina somu tíð, tá ið Gôg skal koma ímóti landi Ísraels, sigur Harrin GUÐ, *at* mín øði skal koma upp í andlit mítt.

19 Tí at í míni ástbrelni *og* í eldinum av míni vreiði havi eg talað, Vissuliga, í tí degi skal tað verða ein mikil risting í landi Ísraels;

20 So at fiskar havsins, og fuglar himinsins, og djór̆ akursins, og øll skriðkykt sum skríða uppiá jørðini, og allir menninir sum *eru* uppiá ásjón jarðarinnar, skulu rista fyri nærveru míni, og fjøllini skulu verða tveitt niður, og tey brøttu plássini skulu falla, og hvør múrur skal falla til jarðarinnar.

21 Og eg vil kalla eftir einum svørði ímóti honum út gjøgnum øll míni fjøll, sigur Harrin GUÐ: hvørs mans svørð skal vera ímóti bróður hansara.

22 Og eg vil føra søk ímóti honum við drepsótt og við blóði; og eg vil regna omanyvir hann, og omanyvir lið̆ hansara, og omanyvir tey mongu fólk sum *eru* við honum, eitt yvirfløðandi regn, og miklar heglsteinar, eld, og svávul.

23 Svá vil eg gera meg sjálvan stóran, og halga meg sjálvan; og eg vil verða kendur í eygunum á mongum tjóðum, og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.

KAPITUL 39

TESSVEGNA, tú menniskjusonur, prophetera ímóti Gôg, og sig, Svá sigur Harrin GUÐ;

Sí, eg *eri* ímóti tær, O Gôg, tí fremsta prinsinum av Mĕ́-sjĕch og Tŭ́-băl:
2 Og eg vil venda tær tilbakar, og eftirlata bert sættapartin av tær, og vil volda tær at koma niðan frá norðurpørtunum, og vil føra teg uppá fjøll Ísraels:
3 Og eg vil sláa tín boga úr tíni vinstru hond, og vil volda tínum ørvum at falla úr tíni høgru hond.
4 Tú skalt falla uppiá fjøllum Ísraels, tú, og øll tíni lið, og fólkið sum *er* við tær: eg vil geva teg at hinum ránsku fuglum av hvørjum slagi, og *til* akursins djór˘ at verða upptærdan.
5 Tú skalt falla uppiá tí opna akrinum: tí at eg havi talað *tað,* sigur Harrin GUÐ.
6 Og eg vil senda ein eld á Má́-gôg, og millum teirra sum búgva sútloysiligani í oyggjunum: og teir skulu vita, at eg *eri* HARRIN.
7 So vil eg gera mítt heilaga navn kent í miðjum fólki mínum Ísrael; og eg vil ikki *lata teir* óreinka mítt heilaga navn meira: og hinir heidnu skulu vita, at eg *eri* HARRIN, Hin Heilagi í Ísrael.
8 ¶ Sí, tað er komið, og tað er gjørt, sigur Harrin GUÐ; hesin *er* dagurin, hvarum eg havi talað.
9 Og teir, sum búgva í staðunum av Ísrael, skulu fara fram, og skulu seta eld á og brenna vápnini, bæði skjøldrarnar og smáskjøldrarnar, bogarnar og ørvarnar, og hondstavirnar, og spjótini, og teir skulu brenna tey við eldi sjey ár:
10 So at teir skulu ongan við˙ taka uttan av akrinum, eiheldur skera niður *nakað* úr skógunum; tí at teir skulu brenna vápnini við eldi: og teir skulu herja teir sum herjaðu teir, og ræna teir sum rændu teir, sigur Harrin GUÐ.
11 ¶ Og tað skal bera á í tí degi, *at* eg vil geva Gôgi eitt plass har av gravum í Ísrael, dalin hjá ferðamonnunum eystanfyri sjógvin: og tað skal tippa *nasir* ferðamannanna: og har skulu teir jarða Gôg og alla hans fjøld: og teir skulu kalla *hann* dal Há́-mŏn-gôg-s.
12 Og sjey mánaðir skal Ísraels hús vera *um* at jarða av teimum, at teir mega reinsa landið.
13 Ja, alt fólk landsins skal jarða *teir;* og tað skal vera fyri teimum eitt navnfremi tann dagin ið eg skal verða dýrðmettur, sigur Harrin GUÐ.
14 Og teir skulu skilja út menn av áframhaldandi starvsseting, farandi ígjøgnum landið at jarða við ferðamonnunum teir sum eru verandi uppiá ásjón jarðarinnar, at reinsa tað: eftir endan á sjey mánaðum skulu teir kanna.
15 Og ferðamenninir *sum* fara ígjøgnum landið, tá ið *nakar* sær eitt mansbein, tá skal hann seta upp eitt merki hjá tí, til jarðarnir hava jarðað tað í dali Há́-mŏn-gôg-s.
16 Og eisini navnið á staðinum *skal vera* Há-mŏ́-nâh. Svá skulu teir reinsa landið.
17 ¶ Og, tú menniskjusonur, svá sigur Harrin GUÐ; Tala yvirat hvørjum fjaðraðum fugli, og til hvørt djór akursins, Flykkið tykkum, og komið; savnið tykkum á hvørjari síðu til mítt sláturoffur sum eg sláturofri fyri tykkum, *enntá* eitt mikið sláturoffur uppiá fjøllum Ísraels, at tit mega eta kjøt, og drekka blóð.
18 Tit skulu eta kjøtið á hinum mektigu, og drekka blóðið á prinsum jarðarinnar, á veðrum, á lombum, og á geitum, á ungtarvum, allir av teimum gøðingar úr Bá́-sjăn.
19 Og tit skulu eta feitt til tit verði mettir, og drekka blóð til tit verði druknir, av mínum sláturofri sum eg havi sláturofrað fyri tykkum.

20 Svá skulu tit verða mettaðir
við borð mítt við hestum og vagn-
um, við mektigum monnum, og
við øllum krígsmonnum, sigur
Harrin GUÐ.
21 Og eg vil seta mína dýrd
hinna heidnu millum, og allir hin-
ir heidnu skulu síggja mín dóm
sum eg havi útint, og mína hond
sum eg havi lagt uppá teir.
22 So Ísraels hús skal vita, at eg
eri HARRIN teirra Guð frá tí degi
og frameftir.
23 ¶ Og hinir heidnu skulu vita,
at Ísrael hús fór inn í fangaskap
fyri sína misgerð: av tí at teir mis-
brutu ímóti mær, tí fjaldi eg mítt
andlit frá teimum, og gav teir inn
í hondina á teirra figgindum: so
fullu teir allir við svørðinum.
24 Samsvarandi við teirra
óreinsku og samsvarandi við teir-
ra misbrot havi eg gjørt teimum,
og fjalt mítt andlit frá teimum.
25 Tessvegna, svá sigur Harrin
GUÐ; Nú vil eg føra aftur fanga-
skap Jákobs, og hava miskunn
yvir heila hús Ísraels, og vil vera
ástbrellin fyri mítt heilaga navn;
26 Eftir at teir hava borið sína
skomm, og øll síni misbrot, hvar-
við teir hava misbrotist ímóti
mær, tá ið teir búðu tryggligani í
landi sínum, og eingin gjørdi *teir*
ræddar.
27 Tá ið eg havi ført teir aftur
frá fólkinum, og savnað teir burt-
ur úr londum figginda teirra, og
eri halgaður í teimum í eygsjónini
á mongum tjóðum;
28 Tá skulu teir vita, at eg *eri*
HARRIN Guð teirra, sum voldi
teimum at verða leiddar inn í
fangaskap hinna heidnu millum:
men eg havi savnað teir at teirra
egna landi, og havi eftirlatið ong-
an av teimum meira har.
29 Eiheldur vil eg fjala mítt
andlit meira frá teimum: tí at eg
havi helt út mín anda uppá Ísra-
els hús, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 40

Í HINUM fimm og tjúgunda
ári av fangaskapi várum, í
byrjanini av árinum, í hinum
tíggjunda *degi* mánaðarins, í hin-
um fjúrtanda ári eftir at staðurin
varð sligin, í sjálvum hinum sama
degi var hond HARRANS uppiá
mær, og førdi meg hagar.
2 Í Guðs-sjónunum førdi hann
meg inn í land Ísraels, og setti
meg uppá eitt sera høgt fjall, hjá
hvørjum *var* eins og skapið á ein-
um staði í suðuri.
3 Og hann førdi meg hagar,
og sí, *har var* ein maður, hvørs
útsjónd *var* eins og útsjóndin á
messing, við einum snóri av lín-
urt í síni hond, og einum máti-
røri; og hann stóð í portrinum.
4 Og maðurin segði við meg,
Menniskjusonur, skoða við eyg-
um tínum, og hoyr við oyrum
tínum, og set títt hjarta uppá alt
sum eg skal sýna tær; tí at til tess
endamáls at eg mátti sýna tær
tey, ert tú førdur higar: kunnger
alt sum tú sært fyri húsi Ísraels.
5 Og sí ein múrur á útsíðuni
av húsinum runt umkring, og í
hondini á manninum eitt mátirør
á seks alnir *langt* eftir alnini og
eina hondbreidd: so hann mát-
aði breiddina á bygninginum,
ēitt rør; og hæddina, ēitt rør.
6 ¶ Tá kom hann at portrinum
sum horvir ímóti eysturi, og fór
upp trappur tess, og mátaði gátt-
ina á portrinum, *sum var* ēitt rør
breið; og hīna gáttina *á portrinum, sum var* ēitt rør breið.
7 Og *hvørt* lítið kamar *var* ēitt
rør langt, og ēitt rør breitt; og
ímillum tey lítlu kømrini *vóru*
fimm alnir; og gáttin á portr-
inum við forhøllina á portrinum
innantil *var* ēitt rør.
8 Hann mátaði eisini forhøll-
ina á portrinum innantil, ēitt rør.
9 So mátaði hann forhøllina á

portrinum, átta alnir; og stólpar tess, tvær alnir; og forhøllin á portrinum *var* innanvert.

10 Og tey lítlu kømrini av portrinum eystureftir *vóru* trý hesumegin, og trý hasumegin; tey trý *vóru* av ēinum máti: og stólparnir høvdu ēitt mát hesumegin og hasumegin.

11 Og hann mátaði breiddina á inngongdini á portrinum, tíggju alnir; *og* longdina á portrinum, trettan alnir.

12 Bilið eisini frammanfyri tey lítlu kømrini *var* ēin alin *hesumegin,* og bilið *var* ēin alin hasumegin: og tey lítlu kømrini *vóru* seks alnir hesumegin, og seks alnir hasumegin.

13 Hann mátaði so portrið frá takinum á *ēinum* lítlum kamari til takið á einum øðrum: breiddin *var* fimm og tjúgu alnir, hurð ímóti hurð.

14 Hann gjørdi eisini stólpar á trísinstjúgu alnir, enntá at stólpanum á forgarðinum rundan um portrið.

15 Og frá ásjónini á inngongdini á portrinum at ásjónini á forhøllini á tí innara portrinum *vóru* fimti alnir.

16 Og *tað vóru* mjáir gluggar til tey lítlu kømrini, og til teirra stólpar innanfyri portrið rundan um, og somuleiðis til hválvini: og gluggar *vóru* rundan um innanvert: og uppiá *hvørjum* stólpa *vóru* pálmatrø.

17 So førdi hann meg inn í ta uttaru forhøllina, og sí, *har vóru* kømur, og ein steinseting gjørd til forgarðin runt umkring: tríati kømur *vóru* uppiá steinsetingini.

18 Og steinsetingin við síðuna av portrunum, áraka longdina á portrunum, *var* tann lægra steinsetingin.

19 So mátaði hann breiddina frá framstøðuni á tí lægra portrinum at framstøðuni á tí innara forgarðinum uttanvert, eitt hundrað alnir eystureftir og norðureftir.

20 ¶ Og portrið á tí uttara forgarðinum sum leit ímóti norðuri, hann mátaði longdina á tí, og breiddina á tí.

21 Og tey lítlu kømrini hjá tí *vóru* trý hesumegin og trý hasumegin; og stólparnir hjá tí og hválvini hjá tí vóru eftir mátinum á tí fyrsta portrinum: longdin á tí *var* fimti alnir, og breiddin fimm og tjúgu alnir.

22 Og gluggarnir hjá teimum, og hválvini hjá teimum, og pálmatrøini hjá teimum, *vóru* eftir mátinum á portrinum sum horvir ímóti eysturi; og teir fóru uppeftir at tí við sjey trinum; og hválvini hjá tí *vóru* frammanfyri tey.

23 Og portrið av tí innara forgarðinum *var* áraka portrið ímóti norðuri, og ímóti eystri; og hann mátaði frá portri til porturs eitt hundrað alnir.

24 ¶ Eftir tað førdi hann meg ímóti suðuri, og sí eitt portur ímóti suðuri: og hann mátaði stólparnar hjá tí og hválvini hjá tí samsvarandi við hesi mát.

25 Og *tað vóru* gluggar í tí og í hválvunum hjá tí runt íkring, líka *sum* teir gluggarnir: longdin *var* fimti alnir, og breiddin fimm og tjúgu alnir.

26 Og *tað vóru* sjey trin at fara upp til tað, og hválvini hjá tí *vóru* frammanfyri tey: og tað hevði pálmatrø, ēitt hesumegin, og eitt annað hasumegin, uppiá stólpunum hjá tí.

27 Og *har var* eitt portur í tí innara forgarðinum ímóti suðuri: og hann mátaði frá portri til porturs ímóti suðuri eitt hundrað alnir.

28 Og hann førdi meg til hin innara forgarð eftir suður portrinum: og hann mátaði suður portrið samsvarandi við hesi mát;

29 Og tey lítlu kømrini hjá tí, og stólparnar hjá tí, og hválvini hjá tí, samsvarandi við hesi mát: og *har vóru* gluggar í tí og í hválvunum hjá tí runt íkring: *tað var* fimti alnir langt, og fimm og tjúgu alnir breitt.

30 Og hválvini runt umkring *vóru* fimm og tjúgu alnir long, og fimm alnir breið.

31 Og hválvini hjá tí *vóru* mótvegis tí uttara forgarðinum; og pálmatrøini *vóru* uppiá stólpunum hjá tí: og niðanfaringin til tað *hevði* átta trin.

32 ¶ Og hann førdi meg inn í hin innara forgarð ímóti eysturi: og hann mátaði portrið samsvarandi við hesi mát.

33 Og tey lítlu kømrini hjá tí, og stólparnir hjá tí, og hválvini hjá tí, *vóru* samsvarandi við hesi mát: og *har vóru* gluggar í tí og í hválvunum hjá tí runt íkring: *tað var* fimti alnir langt, og fimm og tjúgu alnir breitt.

34 Og hválv tess *vóru* mótvegis tí uttara forgarðinum; og pálmatrø *vóru* uppiá stólpum tess, hesumegin, og hasumegin: og niðanfaringin til tað *hevði* átta trin.

35 ¶ Og hann førdi meg til norður portrið, og mátaði *tað* samsvarandi við hesi mát;

36 Tey lítlu kømrini hjá tí, stólparnar hjá tí, og hválvini hjá tí, og gluggarnar til tað runt umkring: longdin *var* fimti alnir, og breiddin fimm og tjúgu alnir.

37 Og stólparnir hjá tí *vóru* mótvegis tí uttara forgarðinum; og pálmatrø *vóru* uppiá stólpunum hjá tí, hesumegin, og hasumegin: og niðanfaringin til tað *hevði* átta trin.

38 Og kømrini og inngongdirnar harhjá *vóru* við stólparnar á portrunum, har teir tváaðu brenniofrið.

39 ¶ Og í forhøllini av portrinum *vóru* tvey borð hesumegin, og tvey borð hasumegin, at vega á tí brenniofrið og syndofrið og misbrotsofrið.

40 Og við síðuna uttantil, sum ēin fer niðan til inngongdina av norður portrinum, *vóru* tvey borð; og hīnumegin, sum *var* við forhøllina av portrinum, *vóru* tvey borð.

41 Fýra borð *vóru* hesumegin, og fýra borð hasumegin, við síðuna av portrinum; átta borð, hvaruppiá teir vógu *síni sláturoffur*.

42 Og tey fýra borðini *vóru* úr høgdum steini til brenniofrið, av eini alin og hálvari long, og eini alin og hálvari breið, og ēina alin høg: hvaruppá eisini teir løgdu amboðini, hvarvið teir vógu brenniofrið og sláturofrið.

43 Og innantil *vóru* húkar, eina hond breiðir, festir runt umkring: og uppiá borðunum *var* kjøtið av ofrinum.

44 ¶ Og uttanfyri hitt innara portrið *vóru* kømrini hjá sangarunum í tí innara forgarðinum, sum *var* við síðuna av norður portrinum; og teirra útsýni *var* ímóti suðuri: eitt við síðuna av eystur portrinum, *havandi* útsýnið ímóti norðuri.

45 Og hann segði við meg, Hetta kamarið, hvørs útsýni *er* ímóti suðuri, *er* til prestarnar, vørðirnar av álegging hússins.

46 Og tað kamarið, hvørs útsýni *er* ímóti norðuri, *er* til prestarnar, vørðirnar av álegging altarsins: hesir *eru* synir Zā́dōk-s millum synir Levīs, sum koma nær til HARRANS at tæna at honum.

47 So hann mátaði forgarðin, eitt hundrað alnir langur, og eitt hundrað alnir breiður, ferhyrntur; og altarið *sum var* frammanfyri húsið.

48 ¶ Og hann førdi meg til forhøllina av húsinum, og mátaði *hvønn* stólpa av forhøllini, fimm

alnir hesumegin, og fimm alnir hasumegin: og breiddin á portrinum *var* tríggjar alnir hesumegin, og tríggjar alnir hasumegin.

49 Longdin á forhøllini *var* tjúgu alnir, og breiddin ellivu alnir; og *hann førdi meg* eftir trinunum, hvarvið teir fóru niðan til hennara: og *tað vóru* súlur við stólparnar, ēin hesumegin, og ein onnur hasumegin.

KAPITUL 41

SÍÐAN førdi hann meg til templið, og mátaði stólparnar, seks alnir breiðir ēinumegin, og seks alnir breiðir hīnumegin, *sum var* breiddin á tabernaklinum.

2 Og breiddin á hurðini *var* tíggju alnir; og síðurnar á hurðini *vóru* fimm alnir ēinumegin, og fimm alnir hīnumegin: og hann mátaði longdina hará, fjøruti alnir: og breiddina, tjúgu alnir.

3 So fór hann innum, og mátaði hurðarstólpan, tvær alnir; og hurðina, seks alnir; og breiddina á hurðini, sjey alnir.

4 So hann mátaði longdina hará, tjúgu alnir; og breiddina, tjúgu alnir, frammanfyri templið: og hann segði við meg, Hetta *er* tað mest heilaga *plássið*.

5 Aftaná mátaði hann múrin á húsinum, seks alnir; og breiddina á *hvørjum* síðukamari, fýra alnir, rundan um húsið á hvørjari síðu.

6 Og síðukømrini *vóru* trý, eitt yvir øðrum, og tríati í skipan; og tey inngingu inn í múrin sum *var* av húsinum til síðukømrini runt umkring, at tey máttu hava hald, men tey høvdu ikki hald í múrinum av húsinum.

7 Og *har var* ein umvaksing, og ein snaring umkring støðugt uppeftir til síðukømrini: tí at snaringin umkring av húsinum fór støðugt uppeftir runt umkring húsið: tessvegna *var* breiddin á húsinum *støðugt* uppeftir, og soleiðis øktist *frá* tí lægsta *kamarinum* til hitt hægsta eftir miðjuni.

8 Eg sá eisini hæddina á húsinum runt umkring: grundvøllirnir av síðukømrunum *vóru* eitt fult rør á seks miklar alnir.

9 Tjúkdin á múrinum, sum *var* hjá síðukømrunum uttantil, *var* fimm alnir: og *tað*, sum *var* eftir, *var* plássið hjá síðukømrunum sum *vóru* innantil.

10 Og ímillum kømrini *var* víddin á tjúgu alnir runt íkring húsið á hvørjari síðu.

11 Og hurðarnar á síðukømrunum *vóru* ímóti *plássinum sum var* eftir, ēin hurð ímóti norðuri, og ein onnur hurð ímóti suðuri: og breiddin á plássinum, sum var eftir, *var* fimm alnir runt íkring.

12 Nú bygningurin, sum *var* frammanfyri tað atskilda plássið við endan ímóti vesturi, *var* sjeyti alnir breiður; og múrurin á bygninginum *var* fimm alnir tjúkkur runt íkring, og longdin á honum níti alnir.

13 So hann mátaði húsið, eitt hundrað alnir langt; og tað atskilda plássið, og bygningin, við múrunum harav, eitt hundrað alnir langt;

14 Eisini breiddina av ásjónini á húsinum, og av tí atskilda plássinum ímóti eysturi, eitt hundrað alnir.

15 Og hann mátaði longdina á bygninginum áraka tað atskilda plássið sum *var* aftanfyri hann, og svalagongdir tess ēinumegin og hīnumegin, eitt hundrað alnir, við tí innara templinum, og forhøllunum av forgarðinum;

16 Hurðarstólparnir, og teir mjáu gluggarnir, og svalagongdirnar rundan um á sínum trimum hæddum, áraka hurðina, tiljaðar við viði runt íkring, og frá jørðini upp til gluggarnar, og gluggarnir *vóru* dekkaðir;

17 Til tað omanfyri hurðina,

enntá at tí innara húsinum, og uttanfyri, og eftir øllum vegginum runt íkring innantil og uttantil, eftir máti.

18 Og *tað var* gjørt við chêr-û-bĭm´-um og pálmatrøum, so at eitt pálmatræ *var* ímillum ein cherub og ein cherub; og *hvør* cherubur hevði tvey andlit;

19 So at andlitið á einum manni *var* ímóti pálmatræinum á tí ēinu síðuni, og andlitið á eini ungari leyvu ímóti pálmatræinum á hīnari síðuni: *tað var* gjørt gjøgnum alt húsið runt íkring.

20 Frá jørðini at uppiyvir hurðini *vóru* chêr-û-bĭm´-ar og pálmatrø gjørd, og *á* veggi tempulsins.

21 Stólparnir á templinum *vóru* ferhyrntir, *og* ásjónin á halgidóminum; útsjóndin *á tí ēina* sum útsjóndin *á hīnum*.

22 Altarið av viði *var* tríggjar alnir høgt, og longdin á tí tvær alnir; og hjørnini á tí, og longdin á tí, og veggirnir á tí, *vóru* av viði: og hann segði við meg, Hetta *er* borðið sum *er* frammanfyri HARRANUM.

23 Og templið og halgidómurin hevði tvær hurðar.

24 Og hurðarnar høvdu tveir veingir *stykkið*, tveir snarandi veingir; tveir *veingir* til ta ēinu hurðina, og tveir veingir til hīna *hurðina*.

25 Og *tað vóru* gjørd á tær, á hurðarnar av templinum, chêr-û-bĭm´-ar og pálmatrø, líka sum *vóru* gjørd uppá veggirnar; og *tað vóru* tjúkkir plankar uppiá ásjónini á forhøllini uttantil.

26 Og *tað vóru* mjáir gluggar og pálmatrø á tí ēinu síðuni og á hīnari síðuni, á síðunum av forhøllini, og *uppiá* síðukømrunum av húsinum, og tjúkkir plankar.

KAPITUL 42

SO førði hann meg fram í hin ytra forgarð, vegin ímóti norðuri: og hann førði meg inn í kamarið sum *var* áraka tað atskilda plássið, og sum *var* frammanfyri bygningin ímóti norðuri.

2 Frammanfyri longdina á eitt hundrað alnir *var* norður hurðin, og breiddin *var* fimti alnir.

3 Yvir av teimum tjúgu *alnunum* sum *vóru* fyri hin innara forgarð, og yvir av steinsetingini sum var fyri hin uttara forgarð, *var* svalagongd ímóti svalagongd í trimum *hæddum*.

4 Og frammanfyri kømrini *var* ein gongd á tíggju alna breidd innanvert, ein vegur á ēina alin; og teirra hurðar ímóti norðuri.

5 Nú, tey ovaru kømrini *vóru* styttri: tí at svalagongdirnar vóru hægri enn hesi, enn tey lægru, og enn tað mittasta av bygningunum.

6 Tí at tey *vóru* í trimum *hæddum,* men høvdu ikki súlur sum súlurnar av forgarðunum: tí varð *bygningurin* trengdur *um* meir enn tað lægsta og tað mittasta frá jørðini.

7 Og múrurin sum *var* uttantil yvir av kømrunum, ímóti tí ytra forgarðinum á forpartinum av kømrunum, longdin á honum *var* fimti alnir.

8 Tí at longdin á kømrunum, sum *vóru* í tí ytra forgarðinum, *var* fimti alnir: og sí, frammanfyri templið *vóru* hundrað alnir.

9 Og frá niðanfyri hesi kømrini *var* inngongdin á eystur síðuni, sum ēin fer inn í tey frá tí ytra forgarðinum.

10 Kømrini *vóru* í tjúkdini á múrinum av forgarðinum ímóti eysturi, áraka tað atskilda plássið, og áraka bygningin.

11 Og vegurin frammanfyri tey *var* eins og útsjóndin á kømrunum sum *vóru* ímóti norðuri, eins langur sum tey, *og* eins breiður sum tey: og allar útgongdirnar hjá teimum *vóru* bæði samsvar-

andi við sniðini hjá teimum, og samsvarandi við hurðarnar hjá teimum.

12 Og samsvarandi við hurðarnar av kømrunum, sum *vóru* ímóti suðuri, *var* ein hurð í vegamótinum, *enntá* veginum beint frammanfyri múrin ímóti eysturi, sum ēin innfer inn í tey.

13 ¶ Tá segði hann við meg, Norður kømrini *og* suður kømrini, sum *eru* frammanfyri tað atskilda plássið, tey *veri* heiløg kømur, har prestarnir, sum nærkast at HARRANUM, skulu eta hini mest heilagu ting: har skulu teir leggja hini mest heilagu ting, og matofrið, og syndofrið, og misbrotsofrið; tí at plássið *er* heilagt.

14 Tá ið prestarnir innfara harinn, tá skulu teir ikki fara út úr hinum heilaga *plássi* inn í hin ytra forgarð, men har skulu teir leggja síni klæðir, í hvørjum teir tæna; tí at tey *eru* heilag; og skulu fara í onnur klæðir, og skulu nærkast til *tey tingini* sum *eru* til fólkið.

15 Nú, tá ið hann hevði lokið við at máta tað innara húsið, førdi hann meg fram ímóti tí portrinum, hvørs útsýni *er* ímóti eysturi, og mátaði tað runt íkring.

16 Hann mátaði eystur síðuna við mátirørinum, fimm hundrað rør, við mátirørinum runt íkring.

17 Hann mátaði norður síðuna, fimm hundrað rør, við mátirørinum runt íkring.

18 Hann mátaði suður síðuna, fimm hundrað rør, við mátirørinum.

19 ¶ Hann vendi íkring til vestur síðuna, *og* mátaði fimm hundrað rør við mátirørinum.

20 Hann mátaði tað eftir teimum fýra síðunum: tað hevði ein múr runt íkring, fimm hundrað *rør* langur, og fimm hundrað breiður, til at gera eina atskiljing ímillum halgidómin og tað vanheilaga plássið.

KAPITUL 43

SÍÐAN førdi hann meg til portrið, *enntá* portrið sum horvir ímóti eysturi:

2 Og sí, dýrd Guðs Ísraels kom frá vegi eystursins: og rødd hansara *var* sum eitt ljóð av mongum vøtnum: og jørðin skein við dýrd hansara.

3 Og *tað var* samsvarandi við útsjóndina á sjónini sum eg sá, *enntá* samsvarandi við sjónina sum eg sá tá ið eg kom at oyðileggja staðin: og sjónirnar *vóru* líka *sum* sjónin sum eg sá við ánna Chē'-bâr; og eg fell uppá andlit mítt.

4 Og dýrd HARRANS kom inn í húsið eftir vegi portursins, hvørs útsýni *er* ímóti eysturi.

5 So andin tók meg upp, og førdi meg inn í hin innara forgarð; og sí, dýrd HARRANS fylti húsið.

6 Og eg hoyrdi *hann* talandi við meg út úr húsinum; og maðurin stóð hjá mær.

7 ¶ Og hann segði við meg, Menniskjusonur, plássið hjá hásæti mínum, og plássið hjá iljum fóta mína, har eg vil búgva í miðjum Ísraels børnum um ævir, og mítt heilaga navn, skal Ísraels hús ei meira dálka, *hvørki* teir, ella kongar teirra, við hordómi sínum, ella við ræunum av kongum sínum í sínum høgu plássum.

8 Í teirra seting av síni gátt við gáttir mínar, og sínum stólpa við stólpar mínar, og vegginum ímillum meg og teir, hava teir enntá dálkað mítt heilaga navn við sínum andstygdum sum teir hava framt: hvørsvegna eg havi upptært teir í míni firtni.

9 Nú, lat teir koyra burtur sín hordóm, og ræini av sínum kongum, fjart frá mær, og eg vil búgva í miðjum teimum um ævir.

10 ¶ Tú menniskjusonur, sýn húsið fyri Ísraels húsi, at teir mega skammast um sínar misgerðir: og lat teir máta mynstrið.

11 Og um teir skammist um alt sum teir hava gjørt, sýn teimum formin á húsinum, og sniðið á tí, og útgongdirnar hjá tí, og inngongdirnar hjá tí, og allar formarnar á tí, og allar regluskipanirnar hjá tí, og allar formarnar hjá tí, og allar lógirnar hjá tí: og skriva *tað* í teirra eygsjón, at teir mega halda heila formin á tí, og allar regluskipanirnar hjá tí, og gera tær.

12 Hetta *er* lóg hússins; Uppiá toppinum av fjallinum *skal* alt markið hjá tí runt umkring *vera* mest heilagt. Sí, hetta *er* lóg hússins.

13 ¶ Og hesi *eru* mátini á altarinum eftir alnunum: Alnin *er* ein alin og eina hondbreidd; enntá botnurin *skal vera* eina alin, og breiddin eina alin, og rondin á tí við kantin á tí runt íkring *skal vera* eina sponn: og hetta *skal vera* tað hægra plássið av altarinum.

14 Og frá botninum *uppiá* jørðini *enntá* til hin niðara stall *skulu vera* tvær alnir, og breiddin ēina alin; og frá tí minna stallinum *enntá* til hin miklara stallin *skulu vera* fýra alnir, og breiddin *ēina* alin.

15 So altarið *skal vera* fýra alnir; og frá altarinum og uppeftir *skulu vera* fýra horn.

16 Og altarið *skal vera* tólv *alnir* langt, tólv breitt, fýrkantað í teimum fýra fýrkantunum hjá tí.

17 Og stallurin *skal vera* fjúrtan *alnir* langur og fjúrtan breiður í teimum fýra fýrkantum av tí; og rondin íkring hann *skal vera* eina hálva alin; og botnurin harav *skal vera* eina alin íkring; og hansara trappur skulu líta ímóti eysturi.

18 ¶ Og hann segði við meg, Menniskjusonur, svá sigur Harrin GUÐ; Hesar *eru* regluskipanir altarsins á tí degi tá ið teir skulu gera tað, til at ofra brennioffur˘ hará, og at sletta blóð hará.

19 Og tú skalt geva til prestanna, Levitanna, sum veri av sáði Zā´-dŏk-s, sum nærkast at mær, til at tæna at mær, sigur Harrin GUÐ, ein ungan ungtarv til eitt syndoffur.

20 Og tú skalt taka av blóðinum harav, og koyra *tað* á tey fýra hornini hjá tí, og á tey fýra hjørnini á stallinum, og uppá rondina runt íkring: svá skalt tú reinsa og reinska tað.

21 Tú skalt taka ungtarvin eisini av syndofrinum, og hann skal brenna hann í tí ásetta plássinum av húsinum, uttanfyri halgidómin.

22 Og á øðrum deginum skalt tú ofra eitt lamb av geitunum uttan lýti til eitt syndoffur; og teir skulu reinsa altarið, eins og teir reinsaðu *tað* við ungtarvinum.

23 Tá ið tú hevurt lokið við at reinsa *tað,* skalt tú ofra ein ungan ungtarv uttan lýti, og ein veðr úr fylginum uttan lýti.

24 Og tú skalt ofra tey frammi fyri HARRANUM, og prestarnir skulu kasta salt uppá tey, og teir skulu ofra tey upp *til* eitt brennioffur at HARRANUM.

25 Sjey dagar skalt tú fyribúgva hvønn dag eina geit *til* eitt syndoffur: teir skulu eisini fyribúgva ein ungan ungtarv, og ein veðr úr fylginum, uttan lýti.

26 Sjey dagar skulu teir reinska altarið og skírga tað; og teir skulu innvíga seg sjálvar.

27 Og tá ið hesir dagar eru útrunnir, skal tað verða, *at* uppá hin áttanda dag, og *so* frameftir, skulu prestarnir gera tykkara brennioffur˘ uppiá altarinum, og tykkara friðoffur˘; og eg vil góðkenna tykkum, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 44

SO førdi hann meg tilbakar vegin av portrinum av tí uttara halgidóminum, sum horvir ímóti eystri; og tað *var* lokað.

2 Tá segði HARRIN við meg; Hetta portrið skal vera lokað, tað skal ikki verða opnað, og eingin maður skal innfara inn hjá tí; av tí at HARRIN, Guð Ísraels, hevur innfarið inn hjá tí, tí skal tað vera lokað.

3 *Tað er* til prinsin; prinsin, hann skal sita í tí til at eta breyð frammi fyri HARRANUM; hann skal innfara eftir veginum av forhøllini av *tí* portrinum, og skal fara út eftir veginum av hinum sama.

4 ¶ Tá førdi hann meg vegin av norður portrinum frammanfyri húsið: og eg hugdi, og sí, dýrd HARRANS fylti hús HARRANS: og eg fell uppá andlit mítt.

5 Og HARRIN segði við meg, Menniskjusonur, merk *tær* væl, og skoða við eygum tínum, og hoyr við oyrum tínum alt sum eg sigi við teg viðvíkjandi øllum regluskipanum HARRANS húss, og øllum lógum tess; og merk *tær* væl inngongdina inn av húsinum, við hvørji útgongd av halgidóminum.

6 Og tú skalt siga til hins uppreistrarsama, *enntá* til Ísraels húss, Svá sigur Harrin GUÐ; O tit Ísraels hús, latið tað *vera* tykkum nóg mikið av øllum tykkar andstygdum,

7 Í at tit hava ført *inn í mín halgidóm* fremmandar, óumskornar í hjarta, og óumskornar í kjøti, at vera í halgidómi mínum, at óreinka hann, *enntá* hús mítt, tá ið tit ofra breyð mítt, feittið og blóðið, og teir hava brotið mín sáttmála orsakað av øllum andstygdum tykkara.

8 Og tit hava ikki hildið áleggingina av mínum heilagu tingum: men tit hava sett haldarar av míni álegging í mín halgidóm til tykkara sjálvs.

9 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Eingin fremmandur, óumskorin í hjarta, ella óumskorin í kjøti, skal innfara inn í mín halgidóm, av nøkrum fremmandum sum *er* Ísraels barna millum.

10 Og Levitarnir, sum eru farnir burtur fjart frá mær, tá ið Ísrael fór til stroks, sum fóru til stroks burtur frá mær eftir avgudum sínum; teir skulu enntá bera sína misgerð.

11 Tó skulu teir vera tænarar í mínum halgidómi, *havandi* álegging við portrini av húsinum, og tænandi fyri húsinum: teir skulu vega brenniofrið og sláturofrið fyri fólkið, og teir skulu standa frammi fyri teimum at tæna at teimum.

12 Av tí at teir tæntu at teimum frammanfyri avgudum teirra, og voldu Ísraels húsi at falla inn í misgerð; tí havi eg lyft upp mína hond ímóti teimum, sigur Harrin GUÐ, og teir skulu bera sína misgerð.

13 Og teir skulu ikki koma nær at mær, at gera embætið hjá einum presti at mær, ella at koma nær til nakað av mínum heilagu tingum, í hinum mest heilaga *plássi:* men teir skulu bera skomm sína, og sínar andstygdir sum teir hava framt.

14 Men eg vil gera teir haldarar av álegging hússins, fyri alla tænastu tess, og fyri alt sum skal verða gjørt í tí.

15 ¶ Men prestarnir, Levitarnir, synir Zā-dōk-s, sum hildu álegging halgidóms míns tá ið Ísraels børn fóru til stroks frá mær, teir skulu koma nær til mín at tæna at mær, og teir skulu standa frammi fyri mær at ofra at mær feittið og blóðið, sigur Harrin GUÐ:

16 Teir skulu innfara inn í mín
halgidóm, og teir skulu koma
nær til borð mítt, at tæna at
mær, og teir skulu halda mína
álegging.
17 ¶ Og tað skal bera á, *at* tá
ið teir innfara inn við portrini av
tí innara forgarðinum, skulu teir
vera klæddir við lín klæðum; og
eingin ull skal koma uppá teir,
meðan teir tæna í portrunum av
tí innara forgarðinum, og innan-
fyri.
18 Teir skulu hava lín høvuð-
búnar uppiá sínum høvdum, og
skulu hava lín brøkur uppiá sín-
um lendum; teir skulu ikki gyrða
seg við nøkrum sum elvir sveitta.
19 Og tá ið teir fara fram í hin
ytra forgarð, *enntá* inn í hin ytra
forgarð til fólkið, skulu teir fara
úr sínum klæðum, í hvørjum teir
tæntu, og leggja tey í hini heilagu
kømur, og teir skulu fara í onnur
klæðir; og teir skulu ikki halga
fólkið við klæðum sínum.
20 Eiheldur skulu teir raka síni
høvur, ella loyva sínum lokkum
at vaksa langir; teir skulu bara
stubba síni høvur.
21 Eiheldur skal nakar prestur
drekka vín, tá ið teir innfara inn í
hin innara forgarð.
22 Eiheldur skulu teir taka til
sínar ektakonur eina einkju, ella
hana sum er koyrd burtur: men
teir skulu taka moyggjar av sáði
Ísraels húss, ella eina einkju sum
hevði ein prest áður.
23 Og teir skulu læra fólk
mítt *munin* ímillum hitt heilaga
og vanheilaga, og elva teimum at
greina ímillum tað óreina og tað
reina.
24 Og í deilumáli skulu teir
standa í dómi; *og* teir skulu døma
tað samsvarandi við mínar dóm-
ar: og teir skulu halda mínar lógir
og mínar ásetingar í øllum savn-
aðum mínum; og teir skulu halga
sabbatar mínar.
25 Og teir skulu ongum deyð-
um persóni koma at til at dálka
seg: uttan fyri faðir, ella fyri móð-
ur, ella fyri son, ella fyri dóttur,
fyri bróður, ella fyri systur sum
ongan ektamann hevur havt, mega
teir dálka seg.
26 Og eftir *at* hann er reinsað-
ur, skulu teir rokna honum sjey
dagar.
27 Og á tí degi sum hann fer
inn í halgidómin, at hinum inn-
ara forgarði, at tæna í halgidóm-
inum, skal hann ofra syndoffur
sítt, sigur Harrin GUÐ.
28 Og tað skal vera teimum
til ein arv: eg *eri* arvur teirra: og
tit skulu onga ogn geva teimum í
Ísrael: eg *eri* ogn teirra.
29 Teir skulu eta matofrið,
og syndofrið, og misbrotsofrið;
og hvørt vígt ting í Ísrael skal
vera teirra.
30 Og hin fyrsti av øllum
frumávøkstunum av øllum *ting-
um,* og hvørt tilbiðjanar-offur av
øllum, av hvørjum *slagi* av tykk-
ara tilbiðjanar-ofrum, skal vera
prestsins: tit skulu eisini geva
prestinum tað fyrsta av deiggi
tykkara, at hann má elva signing-
ini at hvíla í húsi tínum.
31 Prestarnir skulu ikki eta
av nøkrum tingi sum er deytt av
sær sjálvum, ella skrætt, hvørt tað
veri *seg* fuglur ella djór.

KAPITUL 45

HARAFTURAT, tá ið tit
skulu skifta við landi
ið til arvs, *tá* skulu tit ofra eitt
tilbiðjanar-offur at HARRANUM,
ein heilagan skamt av landinum:
longdin *skal vera* longdin á fimm
og tjúgu túsund *rørum,* og breidd-
in *skal vera* tíggju túsund. Hetta
skal vera heilagt í øllum mørkum
tess runt umkring.
2 Av hesum skal vera til halgi-
dómin fimm hundrað *í longd,* við
fimm hundrað *í breidd,* ferkantað

runt umkring; og fimti alnir runt umkring til útjaðarar tess.

3 Og av hesum máti skalt tú máta longdina á fimm og tjúgu túsund, og breiddina á tíggju túsund: og í tí skal vera halgidómurin *og* hitt mest heilaga *plássið*.

4 Hin heilagi *skamtur* landsins skal vera til prestarnar, tænarar halgidómsins, sum skulu koma nær at tæna at HARRANUM: og hann skal vera eitt pláss til húsini hjá teimum, og eitt heilagt pláss til halgidómin.

5 Og hitt fimm og tjúgu túsund til longdar, og hitt tíggju túsund til breiddar, skulu eisini Levitarnir, tænarar hússins, hava til sín sjálvs, til eina ogn til tjúgu kømur.

6 ¶ Og tit skulu útnevna ogn staðarins fimm túsund breiða, og fimm og tjúgu túsund langa, yvir av tilbiðjanar-ofrinum av tí heilaga *skamtinum:* tað skal vera til heila hús Ísraels.

7 ¶ Og *ein skamtur skal vera* til prinsin ēinumegin og hīnumegin av tilbiðjanar-ofrinum av tí heilaga *skamtinum,* og av ogn staðarins, frammanfyri tilbiðjanar-ofrið av tí heilaga *skamtinum,* og frammanfyri ogn staðarins, frá vestur síðuni vestanvert, og frá eystur síðuni eystanvert: og longdin *skal vera* yvir av ēinum av skamtunum, frá vestur markinum at eystur markinum.

8 Í landinum skal vera ogn hans í Ísrael: og mínir prinsar skulu ei meira kúga fólk mítt; og *restina av* landinum skulu teir geva til Ísraels húss samsvarandi við ættargreinir teirra.

9 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Latið tað *vera* tykkum nóg mikið, O prinsar Ísraels: burtflytið harðskap og rán, og útinnið dóm og rættvísi, takið burt tykkar innkrevjingar frá mínum fólki, sigur Harrin GUÐ.

10 Tit skulu hava rættar vágskálir, og eina rætta ḗ-phŭh, og eina rætta bāth.

11 Ḗ-phâh-in og bāthin skulu vera av ēinum máti, at bāthin má innihalda tíggjundarpartin av eini hṓ-mĕr, og ḗ-phâh-in tíggjundarpartin av eini hṓ-mĕr: mátini hará skulu vera eftir hṓ-mĕr-ini.

12 Og sjḗ-kŭl-in *skal vera* tjúgu gḗ-râh-ir: tjúgu sjḗ-kl-ar, fimm og tjúgu sjḗ-kl-ar, fimtan sjḗ-kl-ar, skulu vera tykkara mā́-nēh.

13 Hetta *er* tilbiðjanar-ofrið sum tit skulu ofra; sættapartin av eini ḗ-phŭh av eini hṓ-mĕr av hveiti, og tit skulu geva sættapartin av eini ḗ-phŭh og av eini hṓ-mĕr av byggi:

14 Viðvíkjandi regluskipanini um olju, bāthini av olju, *skulu tit ofra* tíggjundarpartin av eini bāth úr cōrini, *sum er* ein hṓ-mĕr á tíggju bāth; tí at tíggju bāth *eru* ein hṓ-mĕr:

15 Og ēitt lamb úr fylginum, burtur úr tvey hundrað, burtur úr teimum feitu beitunum av Ísrael; til matoffur, og til brennioffur, og til friðoffurˇ, at gera endursóning fyri teir, sigur Harrin GUÐ.

16 Alt fólk landsins skal geva hetta tilbiðjanar-ofrið til prinsin í Ísrael.

17 Og tað skal vera parturin hjá prinsinum *at geva* brennioffurˇ, og matoffurˇ, og drykkoffurˇ, í hátíðunum, og í nýmánunum, á sabbatunum, á øllum hátíðarsemum Ísraels húss: hann skal fyribúgva syndofrið, og matofrið, og brenniofrið, og friðofrini, at gera endursóning fyri Ísraels hús.

18 Svá sigur Harrin GUÐ; Í hinum fyrsta *mánaði,* í hinum fyrsta *degi* mánaðarins, skalt tú taka ein ungan ungtarv uttan lýti, og reinsa halgidómin:

19 Og presturin skal taka av blóði syndoffursins, og koyra *tað* uppá stólpar hússins, og uppá tey fýra hjørnini av stallinum av

altarinum, og uppá stólparnar av portrinum av tí innara forgarðinum.

20 Og soleiðis skalt tú gera hin sjeynda *dag* mánaðarins fyri hvønn tann sum fer skeivur, og fyri *hann sum er* einfaldur: soleiðis skulu tit endursóna húsið.

21 Í hinum fyrsta *mánaði,* í hinum fjúrtanda degi mánaðarins, skulu tit hava umleypið, eina hátíð á sjey dagar; ósúrgað breyð skal verða etið.

22 Og uppá tann dagin skal prinsurin fyribúgva fyri seg sjálvan og fyri alt fólk landsins ein ungtarv *til* eitt syndoffur.

23 Og sjey dagar av hátíðini skal hann fyribúgva eitt brennioffur til HARRANS, sjey ungtarvar og sjey veðrar uttan lýti dagliga teir sjey dagarnar; og ein havur av geitunum dagliga *til* eitt syndoffur.

24 Og hann skal fyribúgva eitt matoffur av eini ē´-phŭh til ein ungtarv, og eina ē´-phŭh til ein veðr, og eina hîn av olju til eina ē´-phŭh.

25 Í hinum sjeynda *mánaði,* í hinum fimtanda degi mánaðarins, skal hann gera hitt líka í hátíð hinna sjey daga, samsvarandi við syndofrið, samsvarandi við brennofrið, og samsvarandi við matofrið, og samsvarandi við oljuna.

KAPITUL 46

SVÁ sigur Harrin GUÐ; Portur hins innara forgarðs, sum lítur ímóti eysturi, skal vera lokað teir seks arbeiðandi dagarnar; men á sabbatinum skal tað verða opnað, og á degi hins nýggja mánaðar skal tað verða opnað.

2 Og prinsurin skal innfara eftir veginum av forhøllini av *tí* portrinum uttanfyri, og skal standa við stólpan av portrinum, og prestarnir skulu fyribúgva hansara brennioffurˇ og hansara friðoffurˇ, og hann skal tilbiðja við gáttina av portrinum: so skal hann fara út; men portrið skal ikki verða lokað inntil kvøldið.

3 Somuleiðis skal fólk landsins tilbiðja við hurðina av hesum portri frammi fyri HARRANUM á sabbatunum og á nýmánunum.

4 Og brenniofrið, sum prinsurin skal ofra HARRANUM á sabbatsdeginum, *skal vera* seks lomb uttan lýti, og ein veðrur uttan lýti.

5 Og matofrið *skal vera* ein ē´-phâh til ein veðr, og matofrið hjá lombunum eins og hann skal vera førur fyri at geva, og ein hîn av olju til eina ē´-phŭh.

6 Og á degi hins nýggja mánaðar *skal tað vera* ein ungur ungtarvur uttan lýti, og seks lomb, og ein veðrur: tey skulu vera uttan lýti.

7 Og hann skal fyribúgva eitt matoffur, eina ē´-phŭh fyri ein ungtarv, og eina ē´-phŭh fyri ein veðr, og fyri lombini samsvarandi sum hans hond skal náa at, og eina hîn av olju til eina ē´-phŭh.

8 Og tá ið prinsurin skal innfara, skal hann fara inn eftir vegi forhallar *tess* porturs, og hann skal fara út eftir vegi tess.

9 ¶ Men tá ið fólk landsins skal koma framfyri HARRAN í hátíðarveitslunum, hann sum innfer inn eftir vegi norður portursins at tilbiðja, skal fara út eftir vegi suður portursins; og hann, ið innfer eftir vegi suður portursins, skal fara út eftir vegi norður portursins: hann skal ikki venda aftur eftir vegi tess porturs, hvarviðˆ hann kom inn, men skal fara út áraka tað.

10 Og prinsurin í miðjum teimum, tá ið teir fara inn, skal fara inn; og tá ið teir fara út, skal fara út.

11 Og í hátíðunum og í hátíðarsemunum skal matofrið vera ein ē´-phâh til ein ungtarv, og ein ē´-phâh til ein veðr, og til lombini eins og hann er førur fyri at geva, og ein hîn av olju til eina ē´-phŭh.

12 Nú, tá ið prinsurin skal fyribúgva eitt fríviljugt brennioffur, ella friðoffurˇ fríviljugani at HARRANUM, *ēin* skal tá opna honum portrið sum lítur ímóti eysturi, og hann skal fyribúgva sítt brennioffur og síni friðoffur, eins og hann gjørdi á sabbatsdeginum: so skal hann fara út; og eftir hansara faring út, skal *ēin* loka portrið.

13 Tú skalt dagliga fyribúgva eitt brennioffur at HARRANUM *av* einum fyrsta árs lambi uttan lýti: tú skalt fyribúgva tað hvønn morgun.

14 Og tú skalt fyribúgva eitt matoffur til tað hvønn morgun, sættapartin av eini ē´-p̲hŭh, og triðjapartin av eini hín av olju, at dempa við tað fína mjølið; eitt matoffur áframhaldandi eftir eini viðvarandi regluskipan at HARRANUM.

15 Svá skulu teir fyribúgva lambið, og matofrið, og oljuna, hvønn morgun *til* eitt áframhaldandi brennioffur.

16 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ; Um prinsurin gevi eina gávu at nøkrum av sonum sínum, arvurin harav skal vera sona hans; hann *skal vera* ogn teirra eftir arvi.

17 Men um hann gevi eina gávu av sínum arvi til ēin av tænarum sínum, tá skal tað vera hansara til frælsisárið; eftir *tað* skal tað venda aftur til prinsin: men hans arvur skal vera sona hansara til teirra.

18 Harafturat skal prinsurin ikki taka av fólksins arvi viðˆ kúgan, at stoyta teir út úr ogn teirra; *men* hann skal geva sonum sínum arv út úr egnu ogn síni: at fólk mítt verði ikki spjaddir hvør maður frá ogn síni.

19 ¶ Aftaná førdi hann meg ígjøgnum inngongdina, sum *var* við síðu portursins, inn í hini heilagu kømur prestanna, sum horvdu ímóti norðuri: og sí, tað *var* eitt pláss á teimum tveimum síðunum vestureftir.

20 Tá segði hann við meg, Hetta *er* plássið har prestarnir skulu kóka misbrotsofrið og syndofrið, har teir skulu baka matofrið; at teir beri *tey* ikki út í hin ytra forgarð, at halga fólkið.

21 Tá førdi hann meg fram í hin ytra forgarð, og voldi mær at fara framvið teimum fýra hjørnunum av forgarðinum; og sí, í hvørjum hjørni av forgarðinum *var* ein forgarður.

22 Í teimum fýra hjørnunum av forgarðinum *vóru* forgarðar sameinaðir, fjøruti *alna* langir og tríati breiðir: hesi fýra hjørnini *vóru* av ēinum máti.

23 Og *har var* ein rød *av bygningi* rundan um í teimum, rundan um teir fýra, og *tað var* gjørt við kókiplássum undir røðunum rundan um.

24 Tá segði hann við meg, Hesi *eru* plássini hjá teimum sum kóka, har tænarar hússins skulu kóka sláturofrið hjá fólkinum.

KAPITUL 47

SÍÐAN førdi hann meg aftur til hurðina á húsinum; og sí, vøtn útgingu út undan gáttini á húsinum eystureftir: tí at framparturin á húsinum *stóð ímóti* eysturi, og vøtnini komu niður undan høgru síðuni av húsinum, við suður *síðuna* av altarinum.

2 So førdi hann meg út hjá veginum av portrinum norðanvert, og leiddi meg um vegin uttanfyri at tí ytra portrinum eftir veginum sum horvir eystureftir; og sí, tað runnu út vøtn høgrumegin.

3 Og tá ið maðurin, sum hevði *máti*bandið í síni hond, fór fram eystureftir, mátaði hann eitt túsund alnir, og hann førdi meg ígjøgnum vøtnini; vøtnini *vóru* til øklanna.

4 Aftur mátaði hann eitt
túsund, og førdi meg ígjøgnum
vøtnini; vøtnini *vóru* til kníggj-
anna. Aftur mátaði hann eitt
túsund, og førdi meg ígjøgnum;
vøtnini *vóru* til lendanna.
5 Síðan mátaði hann eitt túsund;
og tað var ein á, sum eg kundi
ikki fara yvirum: tí at vøtnini
vóru risin, vøtn til at svimja í, ein
á sum kundi ikki farast yvirum.
6 ¶ Og hann segði við meg,
Menniskjusonur, hevurt tú sæð
hetta? Tá førdi hann meg, og
fekk meg at venda aftur til kantin
av ánni.
7 Nú, tá ið eg hevði vent
aftur, sí, við áarbakkan *vóru* sera
mong trø á tí ēinu síðuni og á
hīnari.
8 Tá segði hann við meg, Hesi
vøtn útganga út ímóti eysturland-
inum, og fara oman í oyðimørk-
ina, og fara inn í sjógvin: *hvørji,*
verandi førd fram í sjógvin, skulu
vøtnini verða grødd.
9 Og tað skal bera á, *at* hvørt
ting sum livir, sum flytur *seg,*
hvagarsumhelst *ið* áin skal koma,
skal liva: og har skal vera ein sera
mikil fjøld av fiski, av tí at hesi
vøtn skulu koma hagar: tí at tey
skulu verða grødd; og hvørt ting
skal liva, hvagar áin kemur.
10 Og tað skal bera á, *at* fiski-
*menn*inir skulu standa uppiá tí
frá Ēn-gĕ´-dī enntá at Ēn-ēg´-lâ-
īm; tey skulu vera eitt *pláss* til at
breiða út gørn; teirra fiskur skal
vera samsvarandi við teirra sløg,
eins og fiskur hins mikla sævar,
avbera mangir.
11 Men hini mýrutu pláss har-
av og fenini harav skulu ei verða
grødd; tey skulu verða givin til
salt.
12 Og við ánna uppiá bakka-
num harav, á hesari síðuni og á
hasari síðuni, skulu vaksa øll trø
til matnað, hvørs leyv skal ikki
følna, eiheldur skal ávøksturin
harav verða upptærdur: tað skal
bera fram nýggjan ávøkst sam-
svarandi við mánaðir tess, av tí
at vøtn teirra, tey útgingu út
úr halgidóminum: og ávøksturin
harav skal vera til matnað, og
leyvið harav til heilivág.
13 ¶ Svá sigur Harrin GUÐ;
Hetta *skal vera* markið, hvarvið
tit skulu arva landið samsvar-
andi við hinar tólv ættargreinir
Ísraels: Jóseph *skal hava tveir*
skamtir.
14 Og tit skulu arva tað, ēin
so væl sum ein annar: *viðvíkjandi*
hvørjum eg lyfti upp mína hond
at geva tað at tykkara fedrum: og
hetta landið skal falla at tykkum
til arvs.
15 Og hetta *skal vera* mark
landsins ímóti norður síðuni, frá
sjónum mikla, vegur Hĕth´-lŏn-s,
sum menn fara til Zĕ´-dăd;
16 Há´-măth, Bĕ-rō´-thăh, Sīb´-
rā-īm, sum *er* ímillum mark Da-
mascusar og mark Há´-măth-s;
Hā´-zâr-hăt´-tĭ-cŏn, sum *er* við
bredda Haũ´-răn-s.
17 Og markið frá sjónum skal
vera Hā´-zâr-ē´-năn, mark Damas-
cusar, og tað norð*ara* norðantil,
og mark Há´-măth-s. Og *hetta er*
norður síðan.
18 Og eystur síðuna skulu tit
máta frá Haũ´-răn, og frá Damas-
cus, og frá Gilead, og frá landi
Ísraels *við* Jordan, frá markinum
at eystur sjónum. Og *hetta er*
eystur síðan.
19 Og suður síðuna sunnan-
vert, frá Tá´-mâr *enntá* til klands-
urs-vøtnini *í* Ká´-dĕsj, áin til hins
mikla havs. Og *hetta er* suður
síðan sunnanvert.
20 Vestur síðan eisini *skal vera*
hitt mikla hav frá markinum,
til maður komi áraka Há´-măth.
Hetta *er* vestur síðan.
21 Soleiðis skulu tit skifta hetta
land at tykkum samsvarandi við
ættargreinir Ísraels.

22 ¶ Og tað skal bera á, *at* tit skulu skifta tað við luti til arvs at tykkum, og til hinna fremmandu sum útisita tykkara millum, sum skulu gita børn tykkara millum: og teir skulu vera tykkum sum føddir í landinum millum Ísraels barna; teir skulu hava arv við tykkum millum ættargreina Ísraels.

23 Og tað skal bera á, *at* í hvørji ættargrein hin fremmandi útisitur, har skulu tit geva *honum* arv hansara, sigur Harrin GUÐ.

KAPITUL 48

NÚ, hesi *eru* nøvnini á ættargreinunum. Frá norður endanum til jaðaran av vegi Hĕthlōn-s, sum ēin fer til Há-măth, Hā-zâr-ē-năn, mark Damascusar norðanvert, til bredda Hámăth-s; tí at hesar eru hansara síður eystur *og* vestur, ein *skamtur til* Dáns.

2 Og við markið hjá Dán, frá eystur síðuni at vestur síðuni, ein *skamtur til* Ásjers.

3 Og við markið hjá Ásjer, frá eystur síðuni alt at vestur síðuni, ein *skamtur til* Năph-tâ-lī-s.

4 Og við markið hjá Năph-tâ-lī, frá eystur síðuni at vestur síðuni, ein *skamtur til* Mă-năs-sēh.

5 Og við markið hjá Mă-năs-sēh, frá eystur síðuni at vestur síðuni, ein *skamtur til* Ē-phră-ĭm-s.

6 Og við markið hjá Ē-phră-ĭm, frá eystur síðuni enntá at vestur síðuni, ein *skamtur til* Reûbens.

7 Og við markið hjá Reûbeni, frá eystur síðuni at vestur síðuni, ein *skamtur til* Judah.

8 ¶ Og við markið hjá Judah, frá eystur síðuni at vestur síðuni, skal vera ofrið sum tit skulu ofra á fimm og tjúgu túsund *rør í* breidd, og *í* longd eins og ēin av *hīnum* pørtunum, frá eystur síðuni at vestur síðuni: og halgidómurin skal vera í miðjum tí.

9 Tilbiðjanar-ofrið, sum tit skulu ofra at HARRANUM, *skal vera* fimm og tjúgu túsund til longdar, og tíggju túsund til breiddar.

10 Og fyri teir, *enntá* fyri prestarnar, skal vera *hetta* heilaga tilbiðjanar-ofrið; ímóti norðuri fimm og tjúgu túsund *í longd,* og ímóti vesturi tíggju túsund í breidd, og ímóti eysturi tíggju túsund í breidd, og ímóti suðuri fimm og tjúgu túsund í longd: og halgidómur HARRANS skal vera í miðjum tí.

11 *Tað skal vera* til prestarnar sum eru halgaðir av sonum Zā-dŏk-s; sum hava hildið mína álegging, sum fóru ikki á strok tá ið børn Ísraels fóru á strok, eins og Levitarnir fóru á strok.

12 Og *hetta* tilbiðjanar-offur landsins, sum verður ofrað, skal vera teimum eitt ting mest heilagt við mark Levitanna.

13 Og yvir av marki prestanna *skulu* Levitarnir *hava* fimm og tjúgu túsund í longd, og tíggju túsund í breidd: øll longdin *skal vera* fimm og tjúgu túsund, og breiddin tíggju túsund.

14 Og teir skulu ikki selja av tí, eiheldur skifta um, ella fremmandgera frumávøkstir landsins: tí at *tað er* heilagt at HARRANUM.

15 ¶ Og tey fimm túsund, sum eru eftir í breiddini yvir av teimum fimm og tjúgu túsund, skulu vera eitt vanheilagt *pláss* hjá staðinum, til búgving, og til útjaðarar: og staðurin skal vera í miðjum tí.

16 Og hesi *skulu vera* mátini á tí; norður síðan fýra túsund og fimm hundrað, og suður síðan fýra túsund og fimm hundrað, og á eystur síðuni fýra túsund og fimm hundrað, og vestur síðan fýra túsund og fimm hundrað.

17 Og útjaðararnir av staðinum skulu vera ímóti norðuri tvey hundrað og fimti, og ímóti suðuri tvey hundrað og fimti, og ímóti eysturi tvey hundrað og fimti, og ímóti vesturi tvey hundrað og fimti.

18 Og hitt eftirverandi í longd yvir av tilbiðjanar-ofrinum av hinum heilaga *skamti skal vera* tíggju túsund eystanvert, og tíggju túsund vestanvert: og tað skal vera yvir av tilbiðjanar-ofrinum av hinum heilaga *skamti;* og tess úrtøka skal vera til føðslu hjá teimum sum tæna staðinum.

19 Og teir, sum tæna staðinum, skulu tæna honum burtur úr øllum ættargreinum Ísraels.

20 Alt tilbiðjanar-ofrið *skal vera* fimm og tjúgu túsund ferðir fimm og tjúgu túsund: tit skulu ofra hitt heilaga tilbiðjanar-ofrið ferhyrnt, við ogn staðarins.

21 ¶ Og hitt eftirverandi *skal vera* til prinsin, á tí ēinu síðuni og á hīnari av tí heilaga tilbiðjanar-ofrinum, og av ogn staðarins, yvir av hinum fimm og tjúgu túsund av tilbiðjanar-ofrinum ímóti eystur markinum, og vestanvert yvir av hinum fimm og tjúgu túsund ímóti vestur markinum, yvir av skamtunum til prinsin: og tað skal vera hitt heilaga tilbiðjanar-ofrið; og halgidómur hússins *skal vera* í miðjum tí.

22 Harafturat frá ognini hjá Levitunum, og frá ognini hjá staðinum, *verandi* í miðjum *tí* sum er prinssins, ímillum markið hjá Judah og markið hjá Benjamin, skal vera til prinsin.

23 Hvat restini av ættargreinunum viðvíkur, frá eystur síðuni at vestur síðuni, *skal* Benjamin *hava* ein *skamt*.

24 Og við markið hjá Benjamin, frá eystur síðuni at vestur síðuni, *skal* Símeon *hava* ein *skamt*.

25 Og við markið hjá Símeon, frá eystur síðuni at vestur síðuni, Ĭs´-să-chär ein *skamt*.

26 Og við markið hjá Ĭs´-să-chär, frá eystur síðuni at vestur síðuni, Zē´-bŭ-lŏn ein *skamt*.

27 Og við markið hjá Zē´-bŭ-lŏn, frá eystur síðuni at vestur síðuni, Gád ein *skamt*.

28 Og við markið hjá Gádi, við suður síðuna sunnantil, skal markið vera enntá frá Tá´-mär *at* klandurs-vøtnunum *í* Ká´-dĕsj, *og* til ánna ímóti havinum mikla.

29 Hetta *er* landið sum tit skulu skifta við^ luti at ættargreinum Ísraels til arvs, og hesir *eru* skamtir teirra, sigur Harrin GUÐ.

30 ¶ Og hesar *eru* útgongdir staðarins á norður síðuni, fýra túsund og fimm hundrað mát.

31 Og portrini av staðinum *skulu vera* eftir nøvnunum hjá ættargreinum Ísraels: trý portur norðureftir; ēitt portur hjá Reûbeni, ēitt portur hjá Judah, ēitt portur hjá Levī.

32 Og við eystur síðuna fýra túsund og fimm hundrað: og trý portur; og ēitt portur hjá Jóseph̲i, ēitt portur hjá Benjamin, ēitt portur hjá Dáni.

33 Og við suður síðuna fýra túsund og fimm hundrað mát: og trý portur; ēitt portur hjá Símeon, ēitt portur hjá Ĭs´-să-chär, ēitt portur hjá Zē´-bŭ-lŏn.

34 Við vestur síðuna fýra túsund og fimm hundrað, *við* teirra trimum portrum; ēitt portur hjá Gádi, ēitt portur hjá Ásjeri, ēitt portur hjá Năph̲´-tâ-lī.

35 Rundan um *var tað* átjan túsund *mát:* og navnið á staðinum frá *tí* degi *skal vera,* HARRIN *er* har.

DÁNIELS BÓK.

KAPITUL 1

Í HINUM triðja ári av ríkjan Jē-hŏĭ´-ă-kĭm-s kongs av Judah, kom Nē-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur av Bábylon at Jerusalem, og kringsetti tað.

2 Og Harrin gav Jē-hŏĭ´-ă-kĭm kong av Judah inn í hond hansara, við parti av kerum húsar Guðs: sum hann bar inn í land Sjĭ´-nâr-s til húsar guds síns; og hann førdi kerini inn í dýrgripahús guds síns.

3 ¶ Og kongurin talaði við Ăsj´-pē-năz, meistaran hjá hirðmonnum sínum, at hann skuldi føra *ávísar* av børnum Ísraels, og av sáði kongsins, og av prinsunum;

4 Børn, í hvørjum einkið lýti *var,* men væl vaksnir, og dugnaligir í øllum vísdómi, og kønir í kunnleika, og skiljandi vitinskap, og slíkir sum *høvdu* førleika í sær til at standa í slotti kongsins, og hvørjar teir máttu læra lærdóm og tungu Chăl-dē´-aranna.

5 Og kongurin ásetti teimum eina dagliga veitan av kongsins mati, og av víninum sum hann drakk: soleiðis fostrandi teir trý ár, at við endan hará teir máttu standa frammi fyri konginum.

6 Nú, hesa millum vóru av Judah børnum, Dániel, Hă-năn´-jăh, Mĭ´-sjâ-ĕl, og Ă-zăr´-jăh:

7 Hvørjum prinsurin hjá hirðmonnunum gav nøvn: tí at hann gav Dánieli Bĕl´-tê-sjăz-zâr-s *navnið;* og til Hă-năn´-jăh, Sjá´-drăch-s; og til Mĭ´-sjâ-ĕl-s, Mē´-sjăch-s; og til Ă-zăr´-jăh, Â-bêd-nē´-gô-s.

8 ¶ Men Dániel setti *sær* fyri í hjarta sínum, at hann vildi ikki dálka seg við skamti matar kongsins; ella við víninum sum hann drakk: tí umbað hann av prinsi hirðmannanna, at hann mátti ikki dálkað seg.

9 Nú, Guð hevði ført Dániel inn í góðtokka og eyman kærleika hjá prinsi hirðmannanna.

10 Og prinsurin hjá hirðmonnunum segði við Dániel, Eg óttist harra mín kongin, hvør hevur ásett mat tykkara og drykk tykkara: tí at hví skuldi hann sæð andlitini hjá tykkum *í* verri líki enn børnini sum *eru* av slagi tykkara? tá skulu tit fáa *meg* at seta í váða mítt høvur fyri konginum.

11 Tá segði Dániel til Mĕl´-zâr-s, hvønn prinsur hirðmannanna hevði sett yvir Dánieli, Hă-năn´-jăh, Mĭ´-sjâ-ĕl-i, og Ă-zăr´-jăh,

12 Royn tænarar tínar, eg bøni teg, tíggju dagar; og lat teir geva okkum kálmeti at eta, og vatn at drekka.

13 Tá lat ásjónir várar verða hugdar uppá frammi fyri tær, og ásjónin hjá børnunum sum eta av skamti matar kongsins: og, eins og tú sært, far við tænarum tínum.

14 So hann eftirlíkaði teimum í hesum máli, og royndi teir tíggju dagar.

15 Og við endan á tíggju døgum sýndust teirra ásjónir fagrari og feitari í holdi enn øll børnini sum ótu skamtin av mati kongsins.

16 Mĕl´-zâr soleiðis tók burtur skamtin av teirra mati, og vínið sum teir skuldu drekka; og gav teimum kálmeti.

17 ¶ Hvat hesum fýra børnum viðvíkur, Guð gav teimum kunnleika og hegni í øllum lærdómi og vísdómi: og Dániel hevði skil í øllum sjónum og dreymum.

18 Nú, við endan á døgunum sum kongurin hevði sagt *at* hann skuldi føra teir inn, tá førdi prinsurin hjá hirðmonnunum teir inn framfyri Nē-bŭ-chăd-nēz´-zâr.

19 Og kongurin samtalaði við teir; og millum teirra alra varð

funnin eingin líka *sum* Dániel, Hă-năn´-jăh, Mī´-sjâ-ĕl, og Ă-zăr´-jăh: tí stóðu teir frammi fyri konginum.

20 Og í øllum málevnum vísdóms *og* skils, sum kongurin fregnaði av teimum, fann hann teir tíggju ferðir betri enn allir gandakallarnir *og* stjørnuspáararnir sum *vóru* í øllum ríki sínum.

21 Og Dániel helt áfram *enntá* at fyrsta ári Cýrusar kongs.

KAPITUL 2

OG í øðrum árinum av ríkjan Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr-s droymdi Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr-i dreymar, við hvørjum andi hansara varð órógvaður, og hansara svøvnur sleit frá honum.

2 Tá beyð kongur at kalla gandakallarnar, og stjørnuspáararnar, og galdramenninar, og Chăl-dē´-ararnar, fyri at sýna kongi dreymar hansara. So teir komu og stóðu frammi fyri konginum.

3 Og kongurin segði við teir, Meg hevur droymt ein dreym, og mín andi varð órógvaður at vita dreymin.

4 Tá talaðu Chăl-dē´-ararnir til kongs á Sýr´-ī-ăkk, O kongur, livi um ævir: sig tænarum tínum dreymin, og vit vilja sýna týðingina.

5 Kongurin svaraði og segði til Chăl-dē´-aranna, Luturin er farin frá mær: um tit vilji ikki gera mær kunnan dreymin, við hansara týðing, skulu tit verða skornir í stykkir, og tykkara hús skulu verða gjørd ein tøðrúgva.

6 Men um tit sýni dreymin, og hansara týðing, skulu tit móttaka av mær gávur og endurgjøld og miklan heiður: tessvegna sýnið mær dreymin, og hansara týðing.

7 Teir svaraðu aftur og søgdu, Lat kongin siga tænarum sínum dreymin, og vit vilja sýna týðingina av honum.

8 Kongurin svaraði og segði, Eg veit við vissu, at tit vildu vunnið tíðina, av tí at tit síggja, at luturin er farin frá mær.

9 Men um tit vilji ikki gera mær kunnan dreymin, *tá er bert* ĕin løgskipan til tykkara: tí at tit hava fyribúgvið lúgving og spilt orð˙ at tala frammi fyri mær, til tíðin verði broytt: tessvegna sigið mær dreymin, og eg skal vita, at tit kunnu sýna mær hansara týðing.

10 ¶ Chăl-dē´-ararnir svaraðu frammi fyri konginum, og søgdu, Tað er ikki maður uppiá jørðini, sum kann sýna málevni kongsins: tí *er tað* eingin kongur, harri, ella stjórnari, *sum* umbað slíkar lutir av nøkrum gandakalli, ella stjørnuspáara, ella Chăl-dē´-ara.

11 Og *tað er* ein sjáldsamur lutur sum kongur krevur, og tað er eingin annar sum kann sýna hann frammi fyri kongi, uttan gudarnir, hvørs bústaður er ikki hjá holdi.

12 Fyri hesa grund varð kongurin firtin og sera óður, og beyð at oyða allar vís*menn* Bábylons.

13 Og løgskipanin fór fram, at vís*menn*inir skuldu verða vignir; og teir søktu Dániel og hansara felagar at verða vignar.

14 ¶ Tá tók Dániel til orða við ráði og vísdómi fyri Ár´-ī-ŏch-i, høvuðsmanni lívverju kongsins, sum var farin fram at vega vís*menn* Bábylons:

15 Hann tók til orða og segði til Ár´-ī-ŏch-s, høvuðsmans kongsins, Hví *er* løgboðið *so* skundugt frá kongi? Tá gjørdi Ár´-ī-ŏch lutin kunnan fyri Dánieli.

16 Tá fór Dániel inn, og tráaði av kongi, at hann vildi givið honum tíð, og at hann vildi sýna kongi týðingina.

17 Tá fór Dániel til húss síns, og gjørdi lutin kunnan fyri Hă-năn´-jăh, Mī´-sjâ-ĕl-i, og Ă-zăr´-jăh, lagsbrøðrum sínum:

18 At teir vildu tráa miskunnir av Guði himins viðvíkjandi hesum loyndarmáli; at Dániel og hansara felagar skuldi ikki týnast við restini av vís*monn*um Bábylons.

19 ¶ Tá varð loyndarmálið opinberað Dánieli í eini náttarsjón. Tá vælsignaði Dániel Guð himins.

20 Dániel tók til orða og segði, Vælsignað veri navn Guðs um ævir og ævir: tí at vísdómur og máttur eru hansara:

21 Og hann broytir tíðirnar og tíðarskeiðini: hann burtflytur kongar, og setur upp kongar: hann gevur vísdóm at hinum vísu, og kunnleika til teirra sum kenna skil:

22 Hann opinberar hinar djúpu og loyndu lutir: hann veit hvat í myrkrinum *er,* og ljósið býr hjá honum.

23 Eg takki tær, og prísi tær, O tú Guð fedra mína, hvør hevurt givið mær vísdóm og mátt, og hevurt gjørt kunnugt at mær nú hvat vit tráaðu av tær: tí at tú hevurt *nú* gjørt kunnugt okkum málevni kongsins.

24 ¶ Tessvegna fór Dániel inn at Ár´-ĭ-ŏch-i, hvønn kongur hevði skipað at oyða vís*menn* Bábylons: hann fór og segði svá við hann; Oyð ikki vís*menn* Bábylons: før meg inn framfyri kong, og eg vil sýna kongi týðingina.

25 Tá førdi Ár´-ĭ-ŏch inn Dániel framfyri kong í skundi, og segði svá við hann, Eg havi funnið ein mann av fangum Judah, sum vil gera kunna kongi týðingina.

26 Kongurin svaraði og segði til Dániels, hvørs navn *var* Bĕl´-tê-sjäz-zâr, Ert tú førur fyri at gera kunnan at mær dreymin sum eg havi sæð, og týðing hans?

27 Dániel svaraði í nærveru kongs, og segði, Loyndarmálið, sum kongur hevur kravt, kunnu ikki vís*menn*inir, stjørnuspáararnir, gandakallarnir, spásagnarmenninir, sýna kongi;

28 Men tað er ein Guð í himni sum opinberar loyndarmál˘, og ger kunnugt fyri konginum Nĕbŭ-chăd-nēz´-zâr-i hvat skal verða í hinum seinnu døgum. Tín dreymur, og sjónir høvurs tíns uppiá tíni song, eru hesi;

29 Hvat tær viðvíkur, O kongur, tínar hugsanir komu *inn í tín huga* uppiá tíni song, hvat skuldi henda hereftir: og hann, sum opinberar loyndarmál˘, ger kunnugt fyri tær hvat skal bera á.

30 Men hvat mær viðvíkur, hetta loyndarmál er ikki opinberað fyri mær fyri *nakran* vísdóm sum eg havi meir enn nakar livandi, men fyri *teirra* sakir sum skulu gera kunna týðingina fyri kongi, og at tú máttirt vita hugsanir hjarta tíns.

31 ¶ Tú, O kongur, sást, og sí ein mikil mynd. Henda mikla mynd, hvørs bjartleiki *var* avbærur, stóð frammi fyri tær; og formurin hará *var* ræðuligur.

32 Høvdið á hesi mynd *var* av fínum gulli, hansara bróst og hans armar av silvuri, hansara búkur og hansara lendar av messing,

33 Hansara leggir av jarni, hansara føtur part*vís* av jarni og part*vís* av leiri.

34 Tú sást til ið ein steinur varð skorin út uttan hendur, sum sló myndina uppá hansara føtur *sum vóru* av jarni og leiri, og breyt teir í stykkir.

35 Tá varð jarnið, leirið, messingurin, silvurið, og gullið, brotið í stykkir tilsaman, og gjørdist líka *sum* dumban hjá summar treskigólvunum; og vindurin bar tey burtur, at einkið pláss varð funnið til teirra: og steinurin, sum sló myndina, gjørdist eitt mikið fjall, og fylti alla jørðina.

36 ¶ Hetta *er* dreymurin; og vit vilja siga týðing hansara frammi fyri kongi.

37 Tú, O kongur, *ert* ein kongur konga: tí at Guð himins hevur givið tær eitt kongadømi, mátt, og styrki, og dýrd.

38 Og hvarsumhelst *ið* mannabørnini búgva, hevur hann givið djórˇakursins og fuglar himinsins inn í hond tína, og hevur gjørt teg *til* stjórnara yvir teim øllum. Tú *ert* hetta høvdið av gulli.

39 Og eftir teg skal reisa *seg* eitt annað kongadømi, til afturs fyri tær, og eitt annað triðja kongadømi av messing, sum skal hava stjórn yvir allari jørðini.

40 Og tað fjórða kongadømið skal vera sterkt sum jarn: so mikið sum at jarn brýtur í stykkir og undirleggur øll *ting:* og eins og jarn, sum brýtur øll hesi, skal tað bróta í stykkir og knúsa.

41 Og við tað at tú sást føturnar og tærnar, part*vís* av leiri hjá pottamakarum, og part*vís* av jarni, skal kongadømið verða deilt; men har skal vera í tí av styrki jarnsins, eftirsum at tú sást jarnið blandað við mýrut leir.

42 Og *eins og* tærnar av fótunum *vóru* part*vís* av jarni, og part*vís* av leiri, *so* skal kongadømið vera partvís sterkt, og partvís brotið.

43 Og hvar ið tú sást jarn blandað við mýrut leir, skulu teir blanda seg sjálvar við sáð manna: men teir skulu ikki krøkjast hvør til annars, enntá sum jarn blandast ikki við leir.

44 Og í døgunum hjá hesum kongum skal Guð himins seta upp eitt kongadømi, sum skal aldri verða oytt: og kongadømið skal ikki verða eftirlatið til annað fólk, *men* tað skal bróta í stykkir og upptæra øll hesi kongadømir, og tað skal standa um ævir.

45 Eftirsum at tú sást, at steinurin varð skorin út úr fjallinum uttan hendur, og at hann breyt í stykkir jarnið, messingin, leirið, silvurið, og gullið; hevur hin mikli Guð gjørt kunnugt fyri kongi hvat skal henda hereftir: og dreymurin *er* sikkur, og týðing hansara viss.

46 ¶ Tá fell kongurin Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr uppá sítt andlit, og tilbað Dániel; og ábeyð, at teir skuldu ofra eitt tilbiðjanar-offur og søt angilsir at honum.

47 Kongurin svaraði Dánieli, og segði, Av sonnum *tað er,* at Guð tykkara *er* ein Guð guda, og ein Harri konga, og ein opinberari av loyndarmálum, eftirsum at tú kundirt opinbera hetta loyndarmál.

48 Tá gjørdi kongur Dániel *til* ein miklan mann, og gav honum mangar miklar gávur, og gjørdi hann *til* stjórnara yvir øllum fylki Bábylons, og fremstan av stjórnarunum yvir øllum vís*monn*um Bábylons.

49 Tá fyrispurdi Dániel av kongi, og hann setti Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô, yvir viðurskiftunum hjá fylki Bábylons: men Dániel *sat* í portri kongsins.

KAPITUL 3

NĔ-BŬ-CHĂD-NĒZ´-ZÂR kongur gjørdi eina mynd av gulli, hvørs hædd *var* trísinstjúgu alnir, *og* breiddin hará seks alnir: hann setti hana upp á Dŭ´-ră slætta, í fylki Bábylons.

2 Tá sendi Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur at savna saman prinsarnar, stjórnararnar, og høvuðsmenninar, dómararnar, fæhirðarnar, ráðgevarnar, sýslumenninar, og allar stjórnararnar av fylkjunum, at koma til innvígingina av myndini sum Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur hevði sett upp.

3 Tá vórðu prinsarnir, stjórnararnir, og høvuðsmenn, dómar-

arnir, fæhirðarnir, ráðgevarnir, sýslumenninir, og allir stjórnararnir av fylkjunum, savnaðir saman at innvígingini av myndini sum Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur hevði sett upp; og teir stóðu frammanfyri myndini sum Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr hevði sett upp.

4 Tá geylaði ein heroldur hart, Til tykkara er tað áboðið, O fólk, tjóðir, og tungumál˘,

5 *At* á hvørji tíð tit hoyra ljóðið á kornettini, floytuni, hørpuni, lýranum, psaltrinum, sekkjapípuni, og alskyns tónleiki, tit falli niður og tilbiðji hina gyltu mynd sum Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur hevur sett upp:

6 Og hvørið so fellur ikki niður og tilbiður, skal hina somu stund verða kastaður inn í miðjuna av einum brennandi, eldsligum bræðsluovni.

7 Tessvegna á teirri tíð, tá ið alt fólkið hoyrdi ljóðið á kornettini, floytuni, hørpuni, lýranum, psaltrinum, og alskyns tónleiki, fell alt fólkið, tjóðirnar, og tungumálini, niður *og* tilbóðu hina gyltu mynd sum Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur hevði sett upp.

8 ¶ Hvørsvegna á teirri tíð komu ávísir Chăl-dē´-arar nær, og ákærdu Jødarnar.

9 Teir talaðu og søgdu til Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr-s kongs, O kongur, livi um ævir.

10 Tú, O kongur, hevurt gjørt eina løgskipan, at hvør maður sum skal hoyra ljóðið á kornettini, floytuni, hørpuni, lýranum, psaltrinum, og sekkjapípuni, og alskyns tónleiki, skal falla niður og tilbiðja hina gyltu mynd:

11 Og hvørið so fellur ikki niður og tilbiður, *at* hann skuldi verða kastaður inn í miðjuna av einum brennandi, eldsligum bræðsluovni.

12 Tað eru ávísir Jødar sum tú hevurt sett yvir viðurskiftunum hjá fylki Bábylons, Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô; hesir menn, O kongur, hava ikki givið gætur eftir tær: teir tæna ikki gudum tínum, ella tilbiðja hina gyltu mynd sum tú hevurt sett upp.

13 ¶ Tá beyð Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr í *síni* øði og ovursinni at føra Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô. Tá førdu teir hesar menn framfyri kong.

14 Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr talaði og segði við teir, *Er tað* satt, O Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô, tæna ikki tit gudum mínum, ella tilbiðja hina gyltu mynd sum eg havi sett upp?

15 Nú, um tit veri tilreiðar, at á hvørji tíð tit hoyri ljóðið á kornettini, floytuni, hørpuni, lýranum, psaltrinum, og sekkjapípuni, og alskyns tónleiki, tit falli niður og tilbiðji myndina sum eg havi gjørt; *gott:* men um tit tilbiðji ikki, skulu tit verða kastaðir hina somu stund inn í miðjuna av einum brennandi, eldsligum bræðsluovni; og hvør *er* tann Guð sum skal útfría tykkum út úr hondum mínum?

16 Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô, svaraðu og søgdu til kongsins, O Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr, vit *eru* ikki sútfullir at svara tær í hesum máli.

17 Um tað veri *soleiðis,* vár Guð, hvørjum vit tæna, er førur fyri at útfría okkum frá hinum brennandi, eldsliga bræðsluovni, og hann vil útfría *okkum* út úr hond tíni, O kongur.

18 Men um ikki, veri tað kunnugt tær, O kongur, at vit vilja ikki tæna gudum tínum, ella tilbiðja hina gyltu mynd sum tú hevurt sett upp.

19 ¶ Tá varð Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr fullur av øði, og skapið av hans ásjón varð broytt ímóti Sjá´-drăch-i, Mē´-sjăch-i, og Â-bêd-nē´-gô: *tí* talaði hann, og beyð, at teir

skuldu hita bræðsluovnin *við* ēitt sjey ferðir meira enn hann var vanur at verða hitaður.

20 Og hann beyð hinum mest mektigu monnum, sum *vóru* í heri hansara, at binda Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô, *og* at kasta *teir* inn í hin brennandi, eldsliga bræðsluovn.

21 Tá vórðu hesir menn bundnir í kyrtlum sínum, buksum sínum, og hattum sínum, og *hīnum* klæðum sínum, og vórðu kastaðir inn í miðjuna av hinum brennandi, eldsliga bræðsluovni.

22 Tessvegna, av tí at áboðið hjá kongi var skundugt, og bræðsluovnurin avbera heitur, vá flamman av eldinum menninar sum tóku upp Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô.

23 Og hesir tríggir menn, Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô, fullu niður bundnir inn í miðjuna av hinum brennandi, eldsliga bræðsluovni.

24 Tá varð Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr kongur ovfarin, og reis upp í skundi, *og* talaði, og segði við ráðgevar sínar, Kastaðu ikki vit tríggjar menn bundnar inn í miðjan eldin? Teir svaraðu og søgdu við kong, Satt, O kongur.

25 Hann svaraði og segði, Sí, eg síggi fýra menn leysar, gangandi í miðjum eldinum, og teir hava einkið mein; og formurin á hinum fjórða er líka *sum* Sonur Guðs.

26 ¶ Tá kom Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr nær til munnan á tí brennandi, eldsliga bræðsluovninum, *og* talaði, og segði, Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô, tit tænarar hjá tí mest høga Guði, komið út, og komið *higar*. Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô, tá komu fram út úr miðjum eldinum.

27 Og prinsarnir, landsstjórarnir, og høvuðsmenn, og ráðgevar kongsins, verandi savnaðir saman, sóu hesar menn, uppá hvørs kroppar eldurin hevði ongan mátt, eiheldur var eitt hár høvurs teirra sviðið, eiheldur vóru teirra kyrtlar broyttir, ella hevði lukturin av eldi flutst á teir.

28 *Tá* talaði Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr, og segði, Vælsignaður *veri* Guð Sjá´-drăch-s, Mē´-sjăch-s, og Â-bêd-nē´-gô-s, hvør sent hevur eingil sín, og bjargað tænarum sínum sum troystaðu á hann, og hava broytt orðið hjá kongi, og latið likam síni, at teir máttu ikki tæna ella tilbiðja nakran gud, uttan sín egna Guð.

29 Tí geri eg eina løgskipan, At hvørt fólk, tjóð, og tungumál, sum tala nakað ting óbeint ímóti Guði Sjá´-drăch-s, Mē´-sjăch-s, og Â-bêd-nē´-gô-s, skulu verða skornir í stykkir, og teirra hús skulu verða gjørd *til* eina tøðrúgvu: av tí at tað er eingin annar Guð sum kann bjarga eftir hesum slag.

30 Kongurin tá framflutti Sjá´-drăch, Mē´-sjăch, og Â-bêd-nē´-gô, í fylki Bábylons.

KAPITUL 4

NĔ-BŬ-CHĂD-NĒZ´-ZÂR kongur, at øllum fólki, tjóðum, og tungumálum, sum búgva á allari jørðini; Friður veri margfaldaður at tykkum.

2 Eg hugsaði tað gott at sýna teknini og undrini, sum hin høgi Guð hevur virkað mótvegis mær.

3 Hvør mikil *eru* tekin hans! og hvør mektig *eru* undur hans! hans kongadømi *er* eitt ævigtvarandi kongadømi, og hans harradømi *er* frá ætt til ætt.

4 ¶ Eg, Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr, var í hvíld í húsi mínum, og blomstrandi í slotti mínum:

5 Eg sá ein dreym sum gjørdi meg ræddan, og tankarnir uppiá míni song og sjónir høvurs míns órógvaðu meg.

6 Tí gjørdi eg eina løgskipan,

at føra inn allar vís*menn* Bábylons framfyri meg, at teir máttu gera kunna mær týðingina av dreyminum.

7 Tá komu inn gandakallarnir, stjørnuspáararnir, Chăl-dĕ-ararnir, og spásagnarmenninir: og eg segði dreymin frammi fyri teimum; men teir gjørdu ikki kunna mær týðing hans.

8 ¶ Men við hitt síðsta kom Dániel inn framfyri meg, hvørs navn *var* Bĕl′-tê-sjăz-zâr, samsvarandi við navn guds míns, og í hvørjum *er* andi hinna heilagu guda: og frammi fyri honum taldi eg dreymin, *sigandi,*

9 O Bĕl′-tê-sjăz-zâr, meistari gandakallanna, av tí at eg veit, at andi hinna heilagu guda *er* í tær, og einkið loyndarmál órógvar teg, sig mær sjónirnar av mínum dreymi sum eg havi sæð, og týðing hans.

10 Svá *vóru* sjónir høvurs míns í míni song; Eg sá, og sí eitt træ á miðjari jørðini, og hæddin hará *var* mikil.

11 Træið vaks, og var sterkt, og hæddin hará rakk at himni, og sjónin á tí til endan á allari jørðini:

12 Leyvini harhjá *vóru* føgur, og ávøksturin harhjá mikil, og í tí *var* matur til alra: akursins djór høvdu skugga undir tí, og himinsins fuglar búðu í bulum tess, og alt kjøt varð matað av tí.

13 Eg sá í sjónunum av mínum høvdi uppiá míni song, og sí, ein varðmaður og ein heilagur ēin kom niður frá himni;

14 Hann geylaði hart, og segði svá, Høggið niður træið, og skerið av greinar hans, rystið av leyv˘ hans, og spjaðið frukt hans: latið djórini komast burt undan tí, og fuglarnar frá hansara greinum:

15 Hóast hetta, eftirlatið stubban av rótum hans í jørðini, enntá við einum bandi av jarni og messing, í hinum mjúka grasi akursins; og lat tað vera vátt við døggi himins, og *lat* hansara skamt *vera* við djórunum í grasi jarðarinnar:

16 Lat hans hjarta verða broytt frá mans, og lat eitt djórs hjarta verða givið honum; og lat sjey tíðir fara yvir hann.

17 Henda søk *er* eftir løgskipan varðmannanna, og kravinum eftir orði hinna heilagu: til tess endamáls, at hinir livandi mega vita, at hin mest Høgi stjórnar í kongadømi manna, og gevur tað til hvørssumhelst *ið* hann vil, og setur upp yvir tí hinar niðarligastu av monnum.

18 Henda dreym havi eg, Nĕ-bŭ-chăd-nēz′-zâr kongur, sæð. Nú tú, O Bĕl′-tê-sjăz-zâr, kunnger týðing hans, við tað at allir vís*menn* kongadømis míns eru ikki førir fyri at gera kunna mær týðingina: men tú *ert* førur; tí at andi hinna heilagu guda *er* í tær.

19 ¶ Tá varð Dániel, hvørs navn *var* Bĕl′-tê-sjăz-zâr, ógvaður í ēina stund, og hansara tankar órógvaðu hann. Kongurin talaði, og segði, Bĕl′-tê-sjăz-zâr, lat ikki dreymin, ella týðing hans, órógva teg. Bĕl′-tê-sjăz-zâr svaraði og segði, Mín harri, dreymurin *veri seg* til teirra sum hata teg, og hansara týðing til fígginda tína.

20 Træið sum tú sást, sum vaks, og var sterkt, hvørs hædd rakk at himninum, og sjónin á tí til alla jørðina;

21 Hvørs leyv *vóru* føgur, og tess ávøkstur mikil, og í tí *var* matur til alra; undir hvørjum akursins djór dvaldust, og uppiá hvørs greinum himinsins fuglar høvdu sín bústað:

22 Tað *er* tú, O kongur, sum ert vaksin og vorðin sterkur: tí at tín mikilleiki er vaksin, og røkkur at himni, og títt harradømi til enda jarðarinnar.

23 Og hvar ið kongurin sá ein varðmann og ein heilagan ēin komandi niður frá himni, og sigandi, Høggið træið niður, og oyðið tað; tó eftirlatið stubban av rótum tess í jørðini, enntá við einum bandi av jarni og messing, í hinum bleyta grasi akursins; og lat tað vera vátt við døggi himins, og *lat* hansara skamt *vera* við djórum akursins, til sjey tíðir fari yvir hann;

24 Henda *er* týðingin, O kongur, og henda *er* løgskipanin hjá tí mest Høga, sum er komin uppá harra mín kongin:

25 At teir skulu reka teg frá monnum, og títt býli skal vera hjá djórum akursins, og teir skulu fáa teg at eta gras sum oksar, og teir skulu væta teg við døggi himins, og sjey tíðir skulu fara yvir teg, til tú viti at hin mest Høgi stjórnar í kongadømi manna, og gevur tað til hvørssumhelst hann vil.

26 Og hvar ið teir skipaðu at eftirlata ein stubba av træ-rótunum; skal títt kongadømi vera tær vist, eftir at tú skalt hava vitað, at himnarnir stjórna.

27 Hvørsvegna, O kongur, lat mítt ráð vera góðtakiligt at tær, og brót av tínar syndir við rættvísi, og tínar misgerðir við at sýna miskunn mót hinum ørmu; um tað má verða ein leinging á tíni róligsemi.

28 ¶ Alt hetta kom omanyvir kongin Nĕ-bŭ-chăd-nēz′-zâr.

29 Við endan á tólv mánaðum gekk hann í slotti kongadømis Bábylons.

30 Kongurin talaði, og segði, Er ikki hetta mikla Bábylon, sum eg havi bygt til húss kongadømisins við mátti kraftar mínar, og til heiðurs hátignar mínar?

31 Meðan orðið *var* í munni kongsins, fell ein rødd frá himni, *sigandi,* O kong Nĕ-bŭ-chăd-nēz′-zâr, til tín er tað talað; Kongadømið er farið burt frá tær.

32 Og teir skulu reka teg frá monnum, og títt býli *skal vera* hjá djórum akursins: teir skulu fáa teg at eta gras sum oksar, og sjey tíðir skulu fara yvir teg, inntil tú viti at hin mest Høgi stjórnar í kongadømi manna, og gevur tað til hvørssumhelst hann vil.

33 Hina somu stund var luturin uppfyltur omanyvir Nĕ-bŭ-chăd-nēz′-zâr: og hann varð rikin frá monnum, og át gras sum oksar, og hansara likam var vátt við døggi himins, til hárini hjá honum vóru vaksin sum arna*fjaðrar,* og hansara negl˘ sum fugla*kløur.*

34 Og við endan á døgunum, eg, Nĕ-bŭ-chăd-nēz′-zâr, lyfti upp eygum mínum at himni, og mítt skil vendi aftur at mær, og eg vælsignaði hin mest Høga, og eg prísaði *honum* og ærdi hann sum livir um ævir, hvørs harradømi *er* eitt ævigtvarandi harradømi, og hansara kongadømi *er* frá ætt til ætt:

35 Og allir íbúgvar jarðarinnar *eru* dømdir um sum einkið: og hann ger samsvarandi við vilja sín í heri himins, og *millum* íbúgva jarðarinnar: og eingin kann steðga hond hansara, ella siga við hann, Hvat gert tú?

36 Á hini somu tíð kom skil mítt aftur at mær; og fyri dýrd kongadømis míns, kom mín heiður og bjartleiki aftur at mær; og mínir ráðgevar og mínir harrar søktu til mín; og eg varð grundfestur í mínum kongadømi, og avbær hátign varð løgd afturat mær.

37 Nú eg, Nĕ-bŭ-chăd-nēz′-zâr, prísi og hálovi og æri Kong himins, øll hvørs verk *eru* sannleiki, og hansara vegir dómur: og teir, sum ganga í hugmóði, er hann førur fyri at lækka.

KAPITUL 5

BĚL-SJĂZ´-ZÂR, kongurin, gjørdi eina mikla veitslu fyri eitt túsund av harrum sínum, og drakk vín frammi fyri teimum túsund.

2 Běl-sjăz´-zâr, meðan hann bragdaði vínið, beyð at føra hini gyltu og silvur ker, sum faðir hansara Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr hevði tikið út úr templinum sum *var* í Jerusalem; at kongurin, og prinsar hans, konur hans, og medkonur hans, máttu drekka harí.

3 Tá førdu teir hini gyltu ker, sum vórðu tikin út úr templi húsar Guðs sum *var* í Jerusalem; og kongurin, og prinsar hans, ektakonur hans, og medkonur hans, drukku í teimum.

4 Tey drukku vín, og prísaðu gudunum av gulli, og av silvuri, av messing, av jarni, av viði, og av steini.

5 ¶ Í hini somu stund komu fram fingrar av eini manshond, og skrivaði áraka kertastakan uppá sparslið av vegginum av slotti kongsins: og kongurin sá partin av hondini sum skrivaði.

6 Tá varð kongsins ásjón broytt, og hans tankar órógvaðu hann, so at liðirnir av hansara lendum vórðu loystir, og hansara knø slógu hvørt ímóti øðrum.

7 Kongurin geylaði hart at føra inn stjørnuspáararnar, Chăl-dē´-ararnar, og spásagnarmenninar. *Og* kongurin talaði, og segði til vís*manna* Bábylons, Hvørsumhelst *ið* skal lesa hesa skrift, og sýna mær týðing hennara, skal verða klæddur við skarlak, og *hava* eina ketu av gulli um sín háls, og skal vera hin triðji stjórnari í kongadømunum.

8 Tá komu inn allir vís*menn* kongsins: men teir kundu ikki lesa skriftina, ella gera kunna fyri kongi týðing hennara.

9 Tá varð kong Běl-sjăz´-zâr stórliga órógvaður, og hans ásjón varð broytt í honum, og hansara harrar vórðu ógvaðir.

10 ¶ *Nú* drotningin, uppá grund av orðunum hjá kongi og hjá harrum hans, kom inn í veitsluborðhalds-húsið: *og* drotningin talaði og segði, O kongur, livi um ævir: lat ei tínar hugsanir órógva teg, ella lat tína ásjón verða broytta:

11 Tað er ein maður í kongadømi tínum, í hvørjum *er* andi hinna heilagu guda; og í døgum faðirs tíns ljós og skil og vísdómur, eins og vísdómur gudanna, varð funnið í honum; hvønn kongurin Nĕ-bŭ-chăd-nēz´-zâr, faðir tín, kongurin, *sigi eg*, faðir tín, gjørdi *til* meistara hjá gandakøllunum, stjørnuspáar*un*um, Chăl-dē´-ar*un*um, *og* spásagnarmonn-*un*um;

12 Við tað at ein framúrskarandi andi, og kunnleiki, og skil, týðing av dreymum, og sýning av torførum setningum, og upploysing av ivamálum, vórðu funnin í hinum sama Dánieli, hvønn kongurin nevndi Běl´-tē-sjăz-zâr: nú, lat Dániel verða kallaðan, og hann vil sýna týðingina.

13 Tá varð Dániel førdur inn framfyri kong. *Og* kongur talaði og segði við Dániel, *Ert* tú tann Dániel, sum *ert* av børnum fangaskaps Judah, hvørjar kongurin, faðir mín, førdi út úr Jøda-umráði?

14 Eg havi enntá hoyrt um teg, at andi gudanna *er* í tær, og *at* ljós og skil og framúrskarandi vísdómur finst í tær.

15 Og nú hava vís*menn*inir, stjørnuspáararnir, verðið førdir inn framfyri meg, at teir skuldu lesa hesa skrift, og gera kunna mær týðing hennara: men teir kundu ikki sýna týðingina av lutinum:

16 Og eg havi hoyrt um teg, at

tú kanst gera týðingar, og upploysa ivamálˇ: nú, um tú kanst lesa skriftina, og gera kunna fyri mær týðing hennara, *so* skalt tú verða klæddur við skarlak, og *hava* eina ketu av gulli um tín háls, og skalt vera hin triðji stjórnari í kongadømínum.

17 ¶ Tá svaraði Dániel og segði frammi fyri kongi, Latið tygara gávur vera til tygara sjálvs, og gevið tygara endurgjøld til ein annan; tó vil eg lesa kongi skriftina, og gera kunna fyri honum týðingina.

18 O tú kongur, hin mest høgi Guð gav Nĕ-bŭ-ch̲ăd-nēzˊ-zâr-i, faðir tínum, eitt kongadømi, og hátign, og dýrd, og heiður:

19 Og fyri hátignina sum hann gav honum, øll fólk, tjóðir, og tungumálˇ, nøtraðu og ræddust frammi fyri honum: hvønn hann vildi, vó hann; og hvønn hann vildi, helt hann livandi; og hvønn hann vildi, setti hann upp; og hvønn hann vildi, koyrdi hann niður.

20 Men tá ið hansara hjarta varð lyft upp, og hans hugur herdur í hugmóði, varð hann frákoyrdur frá síni kongligu trónu, og teir tóku hansara dýrd frá honum:

21 Og hann varð rikin frá mannasonunum; og hansara hjarta varð gjørt sum djóranna, og hansara býli *var* hjá villasnunum: teir mataðu hann við grasi sum oksar, og hansara likam var vátt við døggi himins; til hann vitsti at hin mest høgi Guð stjórnaði í kongadømi manna, og *at* hann útnevnir yvir tí hvønnsumhelst hann vil.

22 Og tú, sonur hansara, O Bĕl-sjăzˊ-zâr, hevurt ikki eyðmýkt títt hjarta, tó *at* tú vitstirt alt hetta;

23 Men hevurt lyft upp teg sjálvan ímóti Harra himins; og teir hava ført kerini av hans húsi framfyri teg, og tú, og harrar tínir, konur tínar, og medkonur tínar, hava drukkið vín í teimum; og tú hevurt prísað gudunum av silvuri, og gulli, av messing, jarni, viði, og steini, sum síggja ikki, ella hoyra, ella vita: og tann Guð, í hvørs hond tín andadráttur *er*, og hvørs allir tínir vegir *eru*, hevurt tú ikki dýrðmett:

24 Tá varð parturin av hondini sendur frá honum; og henda skrift varð skrivað.

25 ¶ Og hetta *er* skriftin, sum varð skrivað, MĒˊ-NĒ, MĒˊ-NĒ, TĒˊ-KĔL, Ūˊ-PH̲ÂR-SĬN.

26 Henda *er* týðingin av tinginum: MĒˊ-NĒ; Guð hevur upptalt títt kongadømi, og fullført tað.

27 TĒˊ-KĔL; Tú ert vigaður í vágskálunum, og ert funnin vantandi.

28 PĒˊ-RĔS; Títt kongadømi er sundurbýtt, og givið til Medanna og Persanna.

29 Tá beyð Bĕl-sjăzˊ-zâr, og teir klæddu Dániel við skarlaki, og *koyrdu* eina ketu av gulli um háls hans, og gjørdu eina kunngerð viðvíkjandi honum, at hann skuldi vera hin triðji stjórnari í kongadømínum.

30 ¶ Í teirri nátt varð Bĕl-sjăzˊ-zâr, kongur C̲hăl-dēˊ-anna, vigin.

31 Og Dáˊ-rĭ-ŭs, Mēˊ-dĭ-arin, tók kongadømið, *verandi* umleið trísinstjúgu og tvey ára gamalur.

KAPITUL 6

TAÐ toknaði Dáˊ-rĭ-ŭs-i at seta yvir kongadømínum eitt hundrað og tjúgu prinsar, sum skuldu vera yvir øllum kongadømínum;

2 Og yvir hesum tríggjar forsetar; av hvørjum Dániel *var* fyrstur: at prinsarnir máttu geva teimum roknskapir, og kongurin ongan skaða skuldi hava.

3 Tá varð hesin Dániel tikin framum uppum forsetarnar og prinsarnar, av tí at ein framúrskarandi andi *var* í honum; og kongurin hugsaði at seta hann yvir øllum ríkinum.

4 ¶ Tá søktu forsetarnir og prinsar*nir* at finna høvi ímóti Dánieli viðvíkjandi kongadømum; men teir kundu finna einkið høvi ella feil; við tað at hann *var* trúfastur, eiheldur fanst nøkur villfaring ella feilur í honum.

5 Tá søgdu hesir menn, Vit skulu ikki finna nakað høvi ímóti hesum Dánieli, uttan vit finna *tað* ímóti honum viðvíkjandi lóg Guðs hansara.

6 Tá flykkjaðust hesir forsetar og prinsar saman til kongsins, og søgdu svá við hann, Kong Dá´-rĭ-ŭs, livi um ævir.

7 Allir forsetar kongadømisins, landsstjórarnir, og prinsarnir, ráðgevarnir, og høvuðsmenninir, hava ráðført *seg* saman *um* at grundleggja eina kongliga áseting, og at gera eina fasta løgskipan, at hvørsumhelst *ið* skal umbiðja eina umbøn av nøkrum Guði ella manni í tríati dagar, uttan av tær, O kongur, hann skal verða kastaður inn í leyvnabølið.

8 Nú, O kongur, grundlegg løgskipanina, og undirskriva skrivið, at tað verði ikki broytt, samsvarandi við lógina hjá Medunum og Persunum, sum umbroytist ikki.

9 Hvørsvegna Dá´-rĭ-ŭs kongur undirskrivaði skrivið og løgskipanina.

10 ¶ Nú, tá ið Dániel vitsti, at skrivið var undirskrivað, fór hann inn í hús sítt; og hansara gluggar verandi opnir í hansara kamari mótvegis Jerusalem, knelaði hann uppá síni knø tríggjar ferðir um dag*in*, og bað, og gav tøkkir frammi fyri Guði sínum, eins og hann gjørdi áðurfyrr.

11 Tá flykkjaðust hesir menn, og funnu Dániel biðjandi og gerandi umbøning frammi fyri Guði sínum.

12 Tá komu teir nær, og talaðu frammi fyri kongi viðvíkjandi løgskipan kongsins; Hevurt tú ikki undirskrivað eina løgskipan, at hvør maður sum skal umbiðja *eina umbøn* av nøkrum Guði ella manni innanfyri tríati dagar, uttan av tær, O kongur, skal verða kastaður inn í leyvnabølið? Kongurin svaraði og segði, Luturin *er* sannur, samsvarandi við lógina hjá Medunum og Persunum, sum umbroytist ikki.

13 Tá svaraðu teir og søgdu frammi fyri kongi, Hasin Dániel, sum *er* av børnum fangaskaps Judah, skoytir ikki tær, O kongur, ella løgskipanini sum tú hevurt undirskrivað, men ger sína umbøn tríggjar ferðir um dagin.

14 Kongurin, tá ið hann hoyrdi *hesi* orð, varð sára misnøgdur við seg sjálvan, og setti *sítt* hjarta á Dániel, at útfría hann: og hann strevaði til niðurfaring sólarinnar at útfría hann.

15 Tá flykkjaðust hesir menn at kongi, og søgdu við kong, Vita, O kongur, at lógin hjá Medunum og Persunum *er*, At eingin løgskipan ella áseting, sum kongurin grundleggur, kann verða broytt.

16 Tá skipaði kongur, og teir førdu Dániel, og kastaðu *hann* inn í leyvnabølið. *Nú*, kongurin talaði og segði við Dániel, Tín Guð, hvørjum tú tænirt áframhaldandi, hann vil útfría teg.

17 Og ein steinur varð fingin, og lagdur uppá munnan á bølinum; og kongurin innsiglaði tað við sínum egna innsiglisringi, og við innsiglisringinum hjá harrum sínum; at ráðagerðin mátti ei verða broytt viðvíkjandi Dánieli.

18 ¶ Tá fór kongurin til slott sítt, og umfór náttina fastandi: eiheldur vórðu tónleiks-ljóðførir førd framfyri hann: og hansara svøvnur fór frá honum.

19 Tá reistist kongurin sera árla um morgunin, og fór í skundi at leyvnabølinum.

20 Og tá ið hann kom til bølið, rópaði hann við eini harmførari rødd at Dánieli: *og* kongurin talaði og segði til Dániels, O Dániel, tænari hins livandi Guðs, er tín Guð, hvørjum tú tænirt áframhaldandi, førur fyri at útfría teg frá leyvunum?

21 Tá segði Dániel við kong, O kongur, livi um ævir.

22 Mín Guð hevur sent eingil sín, og hevur lokað munnar leyvnanna, at tær hava ikki meinað meg: við tað at frammi fyri honum sakloysi varð funnið í mær; og eisini frammi fyri tær, O kongur, havi eg einkið mein gjørt.

23 Tá varð kongurin ovurhonds glaður fyri hann, og beyð, at teir skuldu taka Dániel upp út úr bølinum. So Dániel varð tikin upp út úr bølinum, og einkið háttarlag av meini varð funnið uppiá honum, av tí at hann trúði á Guð sín.

24 ¶ Og kongurin ábeyð, og teir førdu hasar menn sum høvdu ákært Dániel, og teir kastaðu *teir* inn í leyvnabølið, teir, teirra børn, og teirra konur; og leyvurnar høvdu meistaradømið av teimum, og brutu øll teirra bein í stykkir áður *enn* nakrantið teir komu at botninum á bølinum.

25 ¶ Tá skrivaði kong Dá´-rĭ-ŭs øllum fólki, tjóðum, og tungumálum, sum dvøljast á allari jørðini; Friður veri margfaldaður at tykkum.

26 Eg geri eina løgskipan, At í hvørjum harradømi kongadømis míns, menn nøtri og óttist frammi fyri Guði Dániels: tí at hann *er* hin livandi Guð, og støðufastur um ævir, og hans kongadømi *tað* sum skal ikki verða oyðilagt, og hans harradømi *skal vera enntá* at endanum.

27 Hann útfríar og bjargar, og hann virkar tekinˇ og undurˇ í himni og á jørð, hvør hevur útfríað Dániel frá mátti leyvnanna.

28 So hesin Dániel framgekk í ríkjan Dá´-rĭ-ŭs-ar, og í ríkjan Cýrusar hins Persiska.

KAPITUL 7

Í HINUM fyrsta ári Bĕl-sjăz´-zâr-s kongs av Bábylon, hevði Dániel ein dreym og sjónir høvurs síns uppiá síni song: tá skrivaði hann dreymin, *og* segði frá samløgu málsins.

2 Dániel talaði og segði, Eg sá í míni sjón um nátt*ina,* og sí, hinir fýra vindar himinsins stríddu uppiá sjónum mikla.

3 Og fýra mikil djór komu upp frá sjónum, ymis hvørt frá øðrum.

4 Hitt fyrsta *var* líka *sum* ein leyva, og hevði arnarveingir: eg skoðaði til veingirnir hjá tí vórðu slitnir, og hon varð lyft upp frá jørðini, og fingin *at* standa uppiá fótunum sum ein maður, og eitt manshjarta varð givið til hennara.

5 Og sí eitt annað djór, eitt næsta, líkt við eina bjørn, og tað reisti upp seg sjálvt á ēinari síðu, og *tað hevði* trý rivjabein í munninum á tí ímillum tenninar hjá tí: og teir søgdu soleiðis við tað, Reis *teg,* gloyp nógv kjøt.

6 Eftir hetta skoðaði eg, og sí eitt annað, líka *sum* ein leopardur, sum hevði uppiá bakinum hjá tí fýra veingir av einum fugli; djórið hevði eisini fýra høvd; og harradømi varð givið til tað.

7 Eftir hetta sá eg í náttarsjónunum, og sí eitt fjórða djór, ønskriligt og ræðuligt, og sterkt framúrliga; og tað hevði miklar jarn tenn: tað gloypti og breyt í stykkir, og trampaði hitt eftirverandi við fótunum hjá tí: og tað *var* ymist frá øllum djórunum sum *vóru* undan tí; og tað hevði tíggju horn.

8 Eg hugleiddi hornini, og sí, har kom upp teirra millum eitt

annað lítið horn, frammi fyri hvørjum tað vórðu trý av hinum fyrstu hornunum slitin upp við rótunum: og sí, í hesum horni *vóru* eygu líka *sum* eyguni á einum manni, og ein munnur talandi miklar lutir.

9 ¶ Eg skoðaði til hásætini vórðu kastaði niður, og hin Fyrndargamli í døgum settist, hvørs klæði *var* hvítt sum snjó, og hár˘ høvurs hansara líka *sum* hin skíra ull: hans hásæti *var eins og* hin eldsliga flamma, *og* hansara hjól˘ *sum* brennandi eldur.

10 Ein eldsligur streymur útgekk og kom fram frá fyri framman honum: túsund túsundir tæntu at honum, og tíggju túsund ferðir tíggju túsund stóðu frammi fyri honum: dómurin varð settur, og bøkurnar vórðu opnaðar.

11 Eg skoðaði tá uppá grund av røddini á hinum miklu orðum sum hornið talaði: eg skoðaði *enntá* til djórið varð vigið, og hansara likam oyðilagt, og givið til hina brennandi flammu.

12 Hvat viðvíkur restini av djórunum, tey høvdu sítt harradømi tikið burt: teirra lív tó vórðu framlongd í eitt tíðarskeið og tíð.

13 Eg sá í náttarsjónunum, og sí, *ēin,* líka *sum* Menniskjusonurin, kom við skýggjum himins, og kom til hins Fyrndargamla í døgum, og teir førdu hann nær framfyri hann.

14 Og tað varð givið honum harradømi, og dýrd, og eitt kongadømi, at øll fólk, tjóðir, og tungumál˘, skuldu tæna honum: hans harradømi *er* eitt ævigtvarandi harradømi, sum skal ikki ganga undir, og hans kongadømi *tað* sum skal ei verða oyðilagt.

15 ¶ Eg, Dániel, varð harmur í mínum anda í miðjum likami *mínum,* og sjónirnar hjá mínum høvdi órógvaðu meg.

16 Eg kom nær at ēinum av teimum ið stóðu hjá, og spurdi hann sannleikan um alt hetta. So hann segði mær, og fekk meg *at* vita týðingina av tingunum.

17 Hesi miklu djór, sum eru fýra, *eru* fýra kongar, *sum* skulu reisa *seg* burtur úr jørðini.

18 Men hinir heilagu hins mest Høga skulu taka kongadømið, og ognast kongadømið um ævir, enntá um ævir og ævir.

19 Tá vildi eg vita sannleikan um tað fjórða djórið, sum var ymist frá øllum hīnum, framúr ønskriligt, hvørs tenn *vóru av* jarni, og neglirnar hjá honum *av* messing; *sum* gloypti, breyt í stykkir, og trampaði hitt eftirverandi við fótum sínum;

20 Og um tey tíggju hornini sum *vóru* í høvdi hansara, og *um* hītt sum kom upp, og frammi fyri hvørjum trý fullu; enntá *um* hatta hornið sum hevði eygu, og ein munn sum talaði sera miklar lutir, hvørs eygnabrá *var* meiri reyst enn hansara felagar.

21 Eg skoðaði, og tað sama hornið førdi kríggj við hinar heilagu, og hevði yvirvág ímóti teimum;

22 Inntil hin Fyrndargamli í døgum kom, og dómur varð givin til hinna heiløgu hins mest Høga; og tíðin kom, at hinir heilagu ognaðust kongadømið.

23 Hann segði soleiðis, Tað fjórða djórið skal vera hitt fjórða kongadømi uppiá jørð, sum skal vera ymist frá øllum kongadømum, og skal gloypa alla jørðina, og skal traðka hana niður, og bróta hana í stykkir.

24 Og tey tíggju hornini burtur úr hesum kongadøminum *eru* tíggju kongar *sum* skulu reisast: og ein annar skal rísa aftaná teir; og hann skal vera ymsur frá hinum fyrsta, og hann skal undirleggja tríggjar kongar.

25 Og hann skal tala *mikil* orð ímóti hinum mest Høga, og skal

máa út hinar heilagu hins mest Høga, og hugsa at broyta tíðir og lógir: og teir skulu verða givnir inn í hond hansara inntil eina tíð og tíðir og deilingina av tíð.

26 Men dómurin skal setast, og teir skulu taka burtur harradømi hansara, at upptæra og at oyða *tað fram*at endanum.

27 Og kongadømið og harradømið, og mikilleikin av kongadóminum undir hinum heila himni, skal verða givið til fólks hinna heiløgu hins mest Høga, hvørs kongadømi *er* eitt ævigtvarandi kongadømi, og øll harradømir skulu tæna og lýða hann.

28 Higartil *er* endin á málevninum. Hvat viðvíkur mær, Dánieli, mínar grundanir mikið órógvaðu meg, og mín ásjón broyttist í mær: men eg goymdi málið í mínum hjarta.

KAPITUL 8

Í HINUM triðja ári av ríkjan Bēl-sjăz´-zâr-s kongs birtist ein sjón at mær, *enntá at* mær, Dánieli, aftaná hana sum birtist mær í fyrstani.

2 Og eg sá í eini sjón; og tað bar á, tá ið eg sá, at eg *var* í Sjū´-sjăn *í* slottinum, sum *er* í fylki Ē´-lăm-s; og eg sá í eini sjón, og eg var við á Ū´-lâi-s.

3 Tá lyfti eg upp eygum mínum, og sá, og sí, har stóð frammanfyri ánna ein veðrur sum hevði *tvey* horn: og tey *tvey* hornini *vóru* høg; men ēitt *var* hægri enn hītt, og hitt hægra kom upp síðst.

4 Eg sá veðrin trýstandi vesturefti, og norðureftir, og suðureftir; so at eingi djór máttu staðið frammi fyri honum, eiheldur *var tað nakar* sum kundi bjarga út úr hond hansara; men hann gjørdi samsvarandi við vilja sín, og gjørdist mikil.

5 Og, sum eg var hugleiðandi, sí, ein geitarhavur kom úr vesturi á ásjón alrar jarðarinnar, og nam ikki við lendið: og geitin *hevði* eitt merkisvert horn ímillum eygu síni.

6 Og hann kom til veðrin sum hevði *tvey* horn, sum eg hevði sæð standandi frammanfyri ánna, og rann at honum í øði kraftar sínar.

7 Og eg sá hann koma nær at veðrinum, og hann varð rørdur við bitranarøði ímóti honum, og sló veðrin, og breyt hansara tvey horn: og tað var eingin kraft í veðrinum at standa frammi fyri honum, men hann kastaði hann niður til jarðarinnar, og trampaði uppá hann: og tað var eingin sum kundi bjarga veðrinum út úr hond hansara.

8 Tí vaks geitarhavurin sera mikil: og tá ið hann var sterkur, varð hitt mikla hornið brotið; og fyri tað komu upp fýra merkisverd ímóti hinum fýra vindum himins.

9 Og burtur úr ēinum av teimum kom fram eitt lítið horn, sum vaks avbera mikið, ímóti suðuri, og ímóti eysturi, og ímóti hinum yndisliga *landi*.

10 Og tað vaks mikið, *enntá* til herlið himins; og tað kastaði niður *sumt* av herliðinum og av stjørnunum til jarðarinnar, og trampaði uppá tær.

11 Ja, hann gjørdi *seg* stóran enntá til prins herliðsins, og við honum varð hitt dagliga *sláturoffur* tikið burtur, og plass halgidóms hansara varð kastað niður.

12 Og eitt herlið varð givið *honum* ímóti hinum dagliga *sláturofri* orsakað av misbroti, og tað kastaði niður sannleikan til jarðarinnar; og tað íðkaði, og framgekk.

13 ¶ Tá hoyrdi eg ēin heilagan talandi, og ein annar heilagur segði við hin ávísa *heilaga* sum talaði, Hvussu leingi *skal vera* sjónin *viðvíkjandi* hinum dagliga *sláturofri,* og misbroti oyðingar-

innar, at geva bæði halgidómin og herliðið til at verða traðkaði undir fót?

14 Og hann segði við meg, *Fram*at tvey túsund og trý hundrað døgum; so skal halgidómurin verða reinsaður.

15 ¶ Og tað bar á, tá ið eg, *enntá* eg Dániel, hevði sæð sjónina, og søkti eftir týdninginum, tá, sí, tað stóð frammi fyri mær sum útsjóndin á einum manni.

16 Og eg hoyrdi eina mansrødd ímillum *áarbakkar* Ū´-lāī-s, sum kallaði, og segði, Gabriel, fá henda *mann* at skilja sjónina.

17 So hann kom nær har eg stóð: og tá ið hann kom, varð eg ræddur, og fell uppá andlit mítt: men hann segði við meg, Fata, O menniskjusonur: tí at á tíð endans *skal* sjónin *vera*.

18 Nú, sum hann var talandi við meg, var eg í einum djúpum svøvni á mínum andliti mótvegis jørðini: men hann nam við meg, og setti meg upprættan.

19 Og hann segði, Sí, eg vil fáa teg *at* skyna hvat skal verða í hinum síðsta enda harmavreiðinnar: tí á hini ásettu tíð *skal* endin *vera*.

20 Veðrurin, sum tú sást, havandi *tvey* horn, *eru* kongarnir av Mē´-dī-ŭ og Persiu.

21 Og hin ruskuta geitin *er* kongurin av Grikkalandi: og hitt mikla horn, sum *er* ímillum eygu hansara, *er* hin fyrsti kongurin.

22 Nú, tað verandi brotið, við tað *at* fýra stóðu upp fyri tað, skulu fýra kongadømir standa upp burtur úr tjóðini, men ikki í kraft hansara.

23 Og í tí seinnu tíðini av teirra kongadømi, tá ið misbrótararnir eru komnir til hins fulnar, skal ein kongur av ógvusligari ásjón, og skiljandi myrkar setningar, standa upp.

24 Og hansara máttur skal vera mektigur, men ikki við egna mátti hansara: og hann skal oyðileggja undursamliga, og skal framganga, og íðka, og skal oyða hitt mektiga og hitt heilaga fólk.

25 Og gjøgnum sítt stjórnarsnildi eisini skal hann elva kynstri at framganga í síni hond; og hann skal gera *seg* stóran í hjarta sínum, og við̂ friði skal oyða mangar: hann skal eisini standa upp ímóti Prinsi prinsa; men hann skal verða brotin uttan hond.

26 Og sjón kvøldsins og morgunsins, sum varð søgd, *er* sonn: hvørsvegna loka tú upp sjónina; tí at hon *skal vera* til mangar dagar.

27 Og eg, Dániel, ørmaktaðist, og var sjúkur *ávísar* dagar; síðan reis eg upp, og gjørdi kongsins gerning; og eg var ovfarin yvir sjónina, men eingin skilti *hana*.

KAPITUL 9

Í HINUM fyrsta ári Dá´-rĭ-ŭs-ar Ă-hăs-vē´-rŭs-ar sonar, av sáði Medanna, sum var gjørdur *til* kong yvir ríki Chăl-dē´-anna;

2 Í hinum fyrsta ári av ríkjan hans, skilti eg, Dániel, við̂ bókum, talið av árunum, um hvørt HARRANS orð kom til Jeremiah prophets, at hann vildi fullføra sjeyti ár í oyðingum Jerusalems.

3 ¶ Og eg setti mítt andlit at Harranum Guði, at søkja við̂ bøn og umbøningum, við føstu, og sekkjaklæði, og øskum:

4 Og eg bað at HARRANUM Guði mínum, og gjørdi játtan mína, og segði, O Harri, hin mikli og ønskriligi Guð, haldandi sáttmálan og miskunn mót teimum ið elska hann, og mót teimum ið halda boðini hjá honum;

5 Vit hava syndað, og hava framt misgerð, og hava gjørt vondliga, og hava gjørt uppreist, enntá við at fara burtur frá forskriftum tínum og frá dómum tínum:

6 Eiheldur hava vit givið gætur at tænarum tínum prophetunum, sum talaðu í navni tínum til konga vára, prinsa vára, og fedra vára, og til alt fólk landsins.

7 O Harri, rættvísi *tilhoyrir* tær, men innat okkum ørkymlan av andlitum, sum á hesum degi; til mannanna av Judah, og til íbúgvanna av Jerusalem, og øllum Ísrael, *sum eru* nær, og *sum eru* langt burturi, gjøgnum øll londini, hvagar tú hevurt rikið teir, uppá grund av teirra misbroti sum teir hava misbrotið ímóti tær.

8 O Harri, til okkara *tilhoyrir* ørkymlan av andliti, til konga vára, til prinsa vára, og til fedra vára, av tí at vit hava syndað ímóti tær.

9 Til Harrans Guðs várs *tilhoyra* miskunnir og fyrigevingar, hóast vit hava gjørt uppreist ímóti honum;

10 Eiheldur hava vit lýtt rødd HARRANS Guðs várs, at ganga í hansara lógum, sum hann setti frammi fyri okkum við sínum tænarum prophetunum.

11 Ja, alt Israel hava misbrotið lóg tína, enntá við at fara burtur, at teir máttu ikki lýða rødd tína; tí er banningin helt uppá okkum, og eiðurin, sum *stendur* skrivaður í lóg Mósesar, tænara Guðs, av tí at vit hava syndað ímóti honum.

12 Og hann hevur staðfest síni orð, sum hann talaði ímóti okkum, og ímóti okkara dómarum sum dømdu okkum, við at føra uppá okkum eina mikla ilsku: tí at undir hinum heila himni hevur ikki verðið gjørt eins og hevur verðið gjørt omanyvir Jerusalem.

13 Eins og skrivað *stendur* í lóg Mósesar, er alt hetta illa komið uppá okkum: tó gjørdu vit ei vára bøn frammi fyri HARRANUM Guði várum, at vit máttu venda frá misgerðum várum, og skilja sannleika tín.

14 Tí hevur HARRIN vakt uppiá tí illa, og ført tað omanyvir okkum: tí at HARRIN Guð vár *er* rættvísur í øllum sínum verkum sum hann ger: tí at vit lýddu ikki rødd hansara.

15 Og nú, O Harri Guð vár, sum hevurt ført fólk títt fram út úr Egyptalandi við eini mektigari hond, og hevurt fingið tær navnfremi, sum á hesum degi; vit hava syndað, vit hava gjørt vondliga.

16 ¶ O Harri, samsvarandi við alla rættvísi tína, eg bøni teg, lat tína firtni og tína øði verða vend burtur frá staði tínum Jerusalem, tínum heilaga fjalli: av tí at fyri syndir várar, og fyri misgerðir fedra vára, *eru* Jerusalem og fólk títt *vorðin* eitt spott fyri øllum *sum eru* kring okkum.

17 Nú, tessvegna, O Guð vár, hoyr bøn tænara tíns, og umbøningar hans, og fá títt andlit at skína uppá halgidóm tín, sum er oyðin, fyri Harrans skuld.

18 O Guð mín, boygg oyra títt, og hoyr; opna eygu tíni, og skoða oyðingar várar, og staðin sum er kallaður við navni tínum: tí at vit framseta ikki várar umbøningar framfyri teg fyri rættvísir várar, men fyri miklu miskunnir tínar.

19 O Harri, hoyr; O Harri, fyrigev; O Harri, gev gætur og ger; útset ikki, fyri tína egnu søk, O Guð mín: tí at staður tín og fólk títt eru kallað við navni tínum.

20 ¶ Og meðan eg *var* talandi, og biðjandi, og játtandi synd mína og synd fólks míns Ísraels, og setandi fram mínar umbøningar framfyri HARRAN Guð mín fyri heilaga fjall Guðs míns;

21 Ja, meðan eg *var* talandi í bøn, enntá maðurin Gabriel, hvønn eg hevði sæð í sjónini at byrja við, verandi voldur at flúgva fljótliga, nam við meg umleið tíðina av kvøld tilbiðjanar-ofrinum.

22 Og hann upplýsti *mær,* og

talaði við meg, og segði, O Dániel, eg eri nú komin fram at geva tær hegni og skil.

23 Við byrjanina av tínum umbøningum kom áboðið fram, og eg eri komin at sýna *tær;* tí at tú *ert* stórliga háttelskaður: tessvegna fata málið, og umhugsa sjónina.

24 Sjeyti vikur eru avráddar uppá fólk títt og uppá heilaga stað tín, at fullføra misbrotið, og at gera enda á syndum, og at gera endursóning fyri misgerð, og at føra inn ævigtvarandi rættvísi, og at innsigla sjónina og prophetī, og at salva hitt mest Heilaga.

25 Vita tessvegna og skyna, *at* frá faringini fram av boðinum at endurbøta og at byggja Jerusalem *fram*at Messiah, Prinsinum, *skulu vera* sjey vikur, og trísinstjúgu og tvær vikur: gøtan skal verða bygd aftur, og múrurin, enntá í trupulsomum tíðum.

26 Og eftir trísinstjúgu og tvær vikur skal Messiah verða skorin av, men ikki fyri seg sjálvan: og fólkið hjá prinsinum, sum skal koma, skal oyðileggja staðin og halgidómin; og endin hará *skal vera* við eini flóð, og *fram*at endanum á kríngum eru oyðingar avráddar.

27 Og hann skal staðfesta sáttmálan við mangar í ēina viku: og í miðjari vikuni skal hann volda sláturofrinum og tilbiðjanar-ofrinum at halda uppat, og fyri yvirbreiðingina av andstygdum skal hann gera *tað* oyði, alt inntil fullføringina, og hatta avrádda skal verða helt uppá hitt oydna.

KAPITUL 10

Í HINUM triðja ári Cýrusar kongs av Persiu, varð ein lutur opinberaður Dánieli, hvørs navn varð kallað Bĕl´-tê-sjăz-zâr; og luturin *var* sannur, men hin ásetta tíð *var* long: og hann skilti lutin, og hevði skil fyri sjónini.

2 Í teimum døgunum var eg, Dániel, harmandi *í* tríggjar samfullar vikur.

3 Eg át einkið yndisligt breyð, eiheldur kom kjøt ella vín í mín munn, eiheldur salvaði eg meg yvirhøvur, til tríggjar heilar vikur vóru fullførdar.

4 Og í hinum fýra og tjúgunda degi hins fyrsta mánaðar, sum eg var við síðuna av ánni miklu, sum *er* Hĭd´-dĕ-kĕl;

5 Tá lyfti eg upp eygum mínum, og hugdi, og sí ein ávísur maður, klæddur í lín, hvørs lendar *vóru* gyrdar við fínum gulli úr Ū´-phăz:

6 Hans likam eisini *var* eins og beryllurin, og hans andlit sum útsjóndin á snarljósi, og hans eygu sum lampur av eldi, og hans armar og hansara føtur líkir í liti við pussaðan messing, og røddin á hans orðum líka *sum* røddin á eini fjøld.

7 Og eg, Dániel, einsamallur sá sjónina: tí at menninir, sum við mær vóru, sóu ikki sjónina; men ein mikil risting fell uppá teir, so at teir flýddu at fjala seg.

8 Tí varð eg eftirlatin einsamallur, og sá hesa miklu sjón, og tað varð eftir eingin styrki í mær: tí at mín tekkiligleiki varð vendur í mær yvirí spillu, og eg afturhelt onga styrki.

9 Tó hoyrdi eg røddina á hans orðum: og tá ið eg hoyrdi røddina á hans orðum, tá var eg í einum djúpum svøvni á andliti mínum, og mítt andlit ímóti jørðini.

10 ¶ Og sí, ein hond nam við meg, sum setti meg uppá míni knø og *uppá* lógvar handa mína.

11 Og hann segði við meg, O Dániel, ein maður stórliga háttelskaður; fata orðini sum eg tali við teg, og statt upprættur: tí at at tær eg eri nú sendur. Og tá ið hann hevði talað hetta orðið við meg, stóð eg nøtrandi.

12 Tá segði hann við meg, Óttast ikki, Dániel: tí at frá tí fyrsta degi sum tú settirt títt hjarta *á* at skilja, og at aga teg frammi fyri Guði tínum, vórðu orð tíni hoyrd, og fyri orð tíni eri eg komin.

13 Men prinsurin av kongadømi Persiu stóð mær ímóti ēin og tjúgu dagar: men sí, Michael, ēin av hinum fremstu prinsum, kom at hjálpa mær; og eg varð verandi har hjá kongum Persiu.

14 Nú eri eg komin at fáa teg *at* skilja, hvat skal viðurfara fólki tínum í hinum seinnu døgum: tí at enn *er* sjónin til *mangar* dagar.

15 Og tá ið hann hevði talað slík orð við meg, setti eg mítt andlit móti jørðini, og eg gjørdist málleysur.

16 Og sí, *ēin,* líka *sum* líksemin á mannasonunum, nam við varrar mínar: tá opnaði eg munn mín, og talaði, og segði við hann sum stóð frammanfyri meg, O harri mín, viðˆ sjónini eru mínar sorgir vendar uppá meg, og eg havi onga styrki afturhildið.

17 Tí at hvussu kann tænarin hjá hesum harra mínum tala við henda harra mín? tí at hvat mær viðvíkur, beinanvegin varð eingin styrki eftirverandi í mær, eiheldur er andadráttur eftir í mær.

18 Tá kom tað aftur og nam við meg *ēin,* líka *sum* útsjóndin á einum manni, og hann styrkti meg,

19 Og segði, O maður stórliga háttelskaður, óttast ikki: friður *veri* at tær, ver sterkur, ja, ver sterkur. Og tá ið hann hevði talað við meg, varð eg styrktur, og segði, Lat harra mín tala; tí at tú hevurt styrkt meg.

20 Tá segði hann, Veitst tú hvørsvegna eg komi at tær? og nú vil eg venda aftur at berjast við prins Persiu: og tá ið eg eri farin fram, sí, *tá* skal prinsurin av Grikkalandi koma.

21 Men eg vil sýna tær tað sum er uppmerkt í skrift sannleikans: og *tað er* eingin sum heldur við mær í hesum tingum, uttan Michael, prinsur tykkara.

KAPITUL 11

EISINI eg í tí fyrsta árinum hjá Dá-rī-ŭs-i, Medanum, *enntá* eg, stóð til at støðufesta og at styrkja hann.

2 Og nú vil eg sýna tær sannleikan. Sí, tað skulu standa upp enn tríggir kongar í Persiu; og hin fjórði skal vera nógv ríkari enn *teir* allir: og viðˆ síni styrki, gjøgnum ríkdómar sínar, skal hann øsa upp allar ímóti ríki Grikkalands.

3 Og ein mektigur kongur skal standa upp, sum skal stjórna við miklum harradømi, og gera samsvarandi við vilja sín.

4 Og tá ið hann skal standa upp, skal hansara kongadømi verða brotið, og skal verða sundurdeilt móti hinum fýra vindum himins; og ikki til eftirkoming hansara, ella samsvarandi við hans harradømi sum hann stjórnaði: tí at hansara kongadømi skal verða slitið upp, enntá til aðrar umframt hasar.

5 ¶ Og kongur suðursins skal vera sterkur, og *ēin* av prinsum hansara; og hann skal vera sterkur uppum hann, og hava harradømi, hans harradømi *skal vera* eitt mikið harradømi.

6 Og í endanum av árum skulu teir sameina seg sjálvar saman; tí at kongsdóttir suðursins skal koma til kongs norðursins at gera eina semju: men hon skal ikki afturhalda kraft armsins; eiheldur skal hann standast, ella armur hans: men hon skal verða givin upp, og teir sum førdu hana, og hann sum gat hana, og hann sum styrkti hana í *hesum* tíðum.

7 Men burtur úr eini grein av hennara rótum skal *ēin* standa upp í hansara støðu, sum skal koma við einum heri, og skal innfara inn í slottið hjá kongi norðursins, og skal fara at ímóti teimum, og skal hava yvirvág:

8 Og skal eisini bera *til* fangar inn í Egyptaland teirra gudar, við teirra prinsum, *og* við teirra dýrabæru kerum av silvuri og av gulli; og hann skal halda áfram *fleiri* ár enn kongur norðursins.

9 So kongur suðursins skal koma inn í kongadømi *hans,* og skal venda aftur inn í egna land sítt.

10 Men hansara synir skulu verða østir upp, og skulu fylkja eina fjøld av miklum *her*styrkjum: og *ēin* skal vissuliga koma, og yvirfløða, og fara ígjøgn: so skal hann koma aftur, og verða østur upp, *enntá* til slott hansara.

11 Og kongur suðursins skal verða rørdur við bitranarvreiði, og skal koma fram og berjast við hann, *enntá* við kong norðursins: og hann skal seta fram eina mikla fjøld; men fjøldin skal verða givin inn í hond hansara.

12 *Og* tá ið hann hevur tikið burt fjøldina, skal hans hjarta verða lyft upp; og hann skal kasta niður *mangar* tíggju túsundir: men hann skal ikki verða styrktur *av tí.*

13 Tí at kongur norðursins skal koma aftur, og skal seta fram eina fjøld, miklari enn hina fyrru, og skal vissuliga koma eftir ávís ár við einum miklum heri og við nógvum ríkidømum.

14 Og í teimum tíðum skulu tað mangir standa upp ímóti kongi suðursins: eisini rænarar fólks tíns skulu upphevja seg sjálvar til at staðfesta sjónina; men teir skulu falla.

15 So kongur norðursins skal koma, og laða upp ein virkisgarð, og taka hinar mest girdu staðir: og armar suðursins skulu ikki mótstanda, eiheldur hans útvalda fólk, eiheldur *skal nøkur* styrki *vera* til at mótstanda.

16 Men hann, sum kemur ímóti honum, skal gera samsvarandi við egna vilja sín, og eingin skal standast frammi fyri honum: og hann skal standa í hinum dýrdsama landi, sum við hansara hond skal verða upptært.

17 Hann skal eisini seta sítt andlit til at innfara við styrki heila kongadømis síns, og reiðiligir við honum; soleiðis skal hann gera: og hann skal geva honum dóttur kvenna, spillandi hana: men hon skal ikki standa *á hansara síðu,* eiheldur vera fyri honum.

18 Eftir hetta skal hann venda sínum andliti at oyggjunum, og skal taka mangar: men ein prinsur síns egna vegna skal elva skemdini, boðin av honum, at halda uppat; uttan sína egnu skemd skal hann elva *henni* at venda aftur omanyvir hann.

19 Tá skal hann venda sínum andliti ímóti festningi egna lands síns: men hann skal snáva og falla, og ei verða funnin.

20 Tá skal standa upp í hansara støðu ein hækkari av skattum *í* dýrd kongadømisins: men innanfyri fáar dagar skal hann verða oyddur, hvørki í firtni, ella í bardaga.

21 Og í hansara støðu skal standa upp ein ringur persónur, til hvørs teir skulu ei geva heiður kongadømisins: men hann skal koma inn friðsamligani, og uppnáa kongadømið við smikranum.

22 Og við armunum av eini flóð skulu teir verða yvirfloymdir frá fyri framman honum, og skulu verða brotnir; ja, eisini prinsur sáttmálans.

23 Og aftaná bandalagið, *gjørt* við hann, skal hann virka sviksamliga: tí at hann skal koma upp, og skal verða sterkur við einum lítlum fólki.

24 Hann skal innfara friðsamliga enntá uppá hini feitastu plàss fylkisins; og hann skal gera *hatta* sum hansara fedrar hava ikki gjørt, ella fedrar fedra hansara; hann skal spjaða teirra millum býtið, og fong, og ríkidømir: *ja,* og hann skal fyrihyggja síni snildarráð ímóti vígvirkjunum, enntá í eina tíð.

25 Og hann skal øsa upp mátt sín og treysti sítt ímóti kongi suðursins við einum miklum heri; og kongur suðursins skal verða østur upp til orrustu við einum sera miklum og mektigum heri; men hann skal ikki standast: tí at teir skulu fyrihyggja snildarráðˇ ímóti honum.

26 Ja teir, sum mata *seg* av skamti mats hansara, skulu oyða hann, og hans herur skal yvirfloyma: og mangir skulu falla niður vignir.

27 Og hjørtuni hjá báðum hesum kongum *skulu vera* til at gera mein, og teir skulu tala lygnir við ēitt borð; men tað skal ikki framganga: tí at enn *skal* endin *vera* á hini ásettu tíð.

28 Tá skal hann venda aftur inn í land sítt við miklum ríkdómum; og hans hjarta *skal vera* ímóti hinum heilaga sáttmála; og hann skal gera *roysnisbrøgd,* og venda aftur til egna lands síns.

29 Á hini ásettu tíð skal hann venda aftur, og koma mótvegis suðuri; men tað skal ikki verða sum hitt fyrra, ella sum tað seinna.

30 ¶ Tí at skipini úr Chĭt´-tĭm skulu koma ímóti honum: tí skal hann verða harmur, og venda aftur, og hava harmavreiði ímóti hinum heilaga sáttmála: soleiðis skal hann gera; hann skal enntá venda aftur, og hava skilvit við teir sum yvirgeva hin heilaga sáttmála.

31 Og armar skulu standa í parti hans, og teir skulu óreinka halgidóm styrkis, og skulu taka burtur hitt dagliga *sláturoffur,* og teir skulu staðseta andstygdina sum ger oyði.

32 Og slíkar, sum gera vondliga ímóti sáttmálanum, skal hann spilla við smikranum: men fólkið, sum kenna Guð sín, skulu vera sterkir, og gera *roysnisbrøgd.*

33 Og teir, sum fata millum fólksins, skulu undirvísa mongum: tó skulu teir falla viðˆ svørðinum, og viðˆ flammu, viðˆ fangaskapi, og viðˆ ráni, *mangar* dagar.

34 Nú, tá ið teir skulu falla, skulu teir verða hjálptir við eini lítlari hjálp: men mangir skulu krøkja *seg* til teirra við smikranum.

35 Og *summir* av teimum av skili skulu falla, at royna teir, og at reinska, og at gera *teir* hvítar, *enntá* til tíð endans: av tí at *tað er* enn fyri eina tíð *sum er* ásett.

36 Og kongurin skal gera samsvarandi við vilja sín; og hann skal upphevja seg sjálvan, og gera seg sjálvan stóran uppum hvønn gud, og skal tala undrunarsamar lutir ímóti Guði guda, og skal framganga, til harmavreiðin verði fullførd: tí at tað, sum er avrátt, skal verða gjørt.

37 Eiheldur skal hann gáa eftir Guði fedra sína, ella tráan kvenna, ella gáa eftir nøkrum gudi: tí at hann skal gera seg sjálvan stóran uppum alt.

38 Men í síni støðu skal hann heiðra Guð krafta: og ein gud, hvønn hansara fedrar kendu ikki, skal hann heiðra við gulli, og silvuri, og við dýrabærum steinum, og dámligum lutum.

39 Svá skal hann gera í hinum

mest sterku vígvirkjum við einum fremmandum gudi, hvønn hann skal viðurkenna *og* økja við dýrd: og hann skal elva teimum at ráða yvir mongum, og skal býta landið fyri vinning.

40 Og við tíð endans skal kongur suðursins trýsta eftir honum: og kongur norðursins skal koma ímóti honum sum ein meldurvindur, við hervagnum, og við hestmonnum, og við mongum skipum; og hann skal innfara inn í londini, og skal yvirfloyma og fara yvir.

41 Hann skal innfara eisini inn í hitt dýrdsama land, og mong *lond* skulu verða kollrend: men hesir skulu komast undan út úr hond hans, *enntá* Ẽ´-dóm, og Móab, og hinir fremstu av børnum Ammons.

42 Hann skal strekkja fram sína hond eisini omanyvir londini: og Egyptaland skal ikki komast undan.

43 Men hann skal hava mátt yvir dýrgripunum av gulli og av silvuri, og yvir øllum hinum dýrabæru lutum Egyptalands: og Lĩ´-bў-ararnir og Ê-thĩ-ŏ´-pĭ-ararnir *skulu vera* við fet˘ hansara.

44 Men tíðindir úr eystri og úr norðri skulu órógva hann: tí skal hann fara fram við miklari øði at oyða, og aldeilis at beina fyri mongum.

45 Og hann skal planta tabernakkul˘ slotts síns ímillum sjógvarnar á hinum dýrdsama heilaga fjalli; tó skal hann koma til enda sín, og eingin skal hjálpa honum.

KAPITUL 12

OG á teirri tíð skal Michael standa upp, hin mikli prinsur sum stendur fyri børn fólks tíns: og tað skal vera ein trongdartíð, slík sum aldri var, síðan ein tjóð var, *enntá* til hasa somu tíð: og á teirri tíð skal fólk títt verða útfríað, hvør tann sum skal verða funnin skrivaður í bókini.

2 Og mangir av teimum, sum sova í dusti jarðarinnar, skulu vakna, summir til ævigtvarandi lívs, og summir til skemdar *og* ævigtvarandi vanvirðingar.

3 Og teir, sum veri vísir, skulu skína sum bjartleiki hválvsins; og teir, sum venda mongum til rættvísis, sum stjørnurnar um ævir og ævir.

4 Men tú, O Dániel, loka fyri orðunum, og innsigla bókina, *enntá* til tíð endans: mangir skulu renna til og frá, og kunnleiki skal verða øktur.

5 ¶ Tá hugdi eg, Dániel, og sí, har stóðu tveir aðrir, tann ēini á hesari síðuni av áarbakkanum, og hīn á hīnari síðuni av áarbakkanum.

6 Og *ēin* segði til mannin — klæddan í lín, sum *var* uppiá vøtnum áarinnar, Hvussu leingi *skal tað vera til* endan av hesum undrum?

7 Og eg hoyrdi mannin, klæddan í lín, sum *var* uppiá vøtnum áarinnar, tá hann helt uppi síni høgru hond og síni vinstru hond at himni, og svór við hann sum livir um ævir, at *tað skal vera* fyri eina tíð, tíðir, og eina hálva; og tá ið hann skal hava fullført at spjaða mátt hins heilaga fólks, skulu øll hesi *ting* verða fullførd.

8 Og eg hoyrdi, men eg skilti ikki: tá segði eg, O Harri mín, hvat *skal verða* endin á hesum *tingum?*

9 Og hann segði, Far tín veg, Dániel: tí at orðini *eru* afturlatin og innsiglaði til tíð endans.

10 Mangir skulu verða skírgaðir, og gjørdir hvítir, og royndir; men hinir vondu skulu gera vondliga: og eingin av hinum vondu skal skilja; men hinir vísu skulu skilja.

11 Og frá tíðini *sum* tað dagliga *sláturofrið* skal verða tikið burtur, og andstygdin, sum ger oyði, sett upp, *skulu tað vera* eitt túsund *og* tvey hundrað og níti dagar.
12 Vælsignaður *er* hann sum bíðar, og kemur til hinar túsund *og* trý hundrað og fimm og tríati dagar.
13 Men far tú tín veg til endin *verði:* tí at tú skalt hvíla, og standa í tínum luti við enda daganna.

HÓSEA.

KAPITUL 1

ORÐ HARRANS, sum kom at Hó´-sē-ă Bēēr´-ī-s syni í døgum Ūz´-zĭ-ăh, Jó´-thăm-s, Áhazar, *og* Hēz-ē-kī´-ăh, Judah konga, og í døgum Jēr-ó´-bô-ăm-s Jó´-ăsj sonar, Ísraels kongs.
2 Byrjanin av orði HARRANS við^ Hó´-sē-ă. Og HARRIN segði til Hó´-sē-ă, Far, tak at tær eina ektakonu av hordómum og børn av hordómum: tí at landið hevur framt miklan hordóm, *víkjandi* frá HARRANUM.
3 So hann fór og tók Gō´-mĕr Dĭb´-lă-ĭm-s dóttur; sum gat, og føddi honum ein son.
4 Og HARRIN segði við hann, Kalla navn hansara Jēz´-rēēl; tí at enn ein lítil *stund,* og eg vil hevna blóð Jēz´-rēēl-s omanyvir hús Jehu-s, og vil elva at halda uppat kongadømi Ísraels húss.
5 Og tað skal bera á í tí degi, at eg vil bróta boga Ísraels í dali Jēz´-rēēl-s.
6 ¶ Og hon gat aftur, og føddi eina dóttur. Og *Guð* segði við hann, Kalla navn hennara Lō-rû-há´-măh: tí at eg vil ei meira hava miskunn yvir hús Ísraels; men eg vil aldeilis taka teir burt.
7 Men eg vil hava miskunn yvir hús Judah, og vil frelsa teir við^ HARRANUM Guði teirra, og vil ikki frelsa teir við^ boga, ella við^ svørði, ella við^ bardaga, við^ hestum, ella við^ hestmonnum.
8 ¶ Nú, tá ið hon hevði avvant Lō-rû-há´-mŭh, gat hon, og føddi ein son.
9 Tá segði *Guð,* Kalla navn hansara Lō-ăm´-mī: tí at tit *eru* ikki fólk mítt, og eg vil ikki vera *Guð* tykkara.
10 ¶ Tó skal talið á børnum Ísraels vera sum sandur havsins, sum kann ei verða mátaður ella upptaldur; og tað skal bera á, *at* í tí plássi har tað varð sagt við teir, Tit *eru* ikki fólk mítt, *har* skal tað verða sagt við teir, *Tit eru* synir hins livandi Guðs.
11 Tá skulu børn Judah og børn Ísraels verða savnaðir saman, og útnevna sær ēitt høvd, og teir skulu koma upp út úr landinum: tí at mikil *skal vera* dagur Jēz´-rēēl-s.

KAPITUL 2

SIGIÐ tit við brøður tykkara, Ăm´-mī; og til systra tykkara, Rû-há´-măh.
2 Førið søk við móður tykkara, førið søk: tí at hon *er* ikki ektakona mín, eiheldur *eri* eg ektamaður hennara: lat hana tí koyra burt sínar hordómar út úr eygsjón síni, og síni horaríir frá ímillum síni bróst;
3 At ikki eg berki hana nakna, og seti hana sum í tí degi ið hon varð fødd, og geri hana sum eina oyðu, og seti hana líka *sum* eitt turt land, og vegi hana við torsta.
4 Og eg vil ikki hava miskunn yvir børn hennara; tí at tey *veri seg* børnini av hordómum.

5 Tí at móðir teirra hevur spælt
skøkjan: hon, sum gat tey, hevur
gjørt skammiliga: tí at hon segði,
Eg vil fara eftir elskarum mínum,
sum geva *mær* breyð mítt og vatn
mítt, mína ull og mína línurt,
mína olju og mín drykk.
6 ¶ Tessvegna, sí, eg vil byrgja
upp tín veg við tornum, og gera
ein múr, at hon skal ei finna leiðir
sínar.
7 Og hon skal fylgja eftir elsk-
arum sínum, men hon skal ikki
innheinta teir; og hon skal søkja
teir, men skal ikki finna *teir:* tá
skal hon siga, Eg vil fara og venda
aftur til mín fyrsta ektamann; tí at
tá *var tað* betri hjá mær enn nú.
8 Tí at hon vitsti ikki, at eg
gav henni korn, og vín, og olju,
og margfaldaði hennara silvur og
gull, *sum* teir fyribúðu til Bā́-ăl-s.
9 Tí vil eg venda aftur, og taka
burtur mítt korn í tíð tess, og mítt
vín í tíðarskeiði tess, og vil endur-
heinta mína ull og mína línurt,
givin at dekka hennara nakni.
10 Og nú vil eg avdúka hennara
skammloysi í eygsjónini á henn-
ar elskarum, og eingin skal bjarga
henni út úr hond míni.
11 Eg vil eisini elva øllum henn-
ara kæti at halda uppat, hennara
hátíðar-døgum, hennara nýmán-
um, og hennara sabbatum, og øll-
um hennara hátíðar-veitslum.
12 Og eg vil oyða hennara vín-
trø og hennara fikutrø, hvarum
hon hevur sagt, Hesi *eru* míni
endurgjøld, sum mínir elskarar
hava givið mær: og eg vil gera
tey *til* ein skóg, og djór akursins
skulu eta tey.
13 Og eg vil heimsøkja uppá
hana dagar Bā́-ă-līm-s, í hvørjum
hon brendi roykilsi til teirra, og
hon dekkaði seg sjálva við sínum
oyrnaringum og sínum smúkk-
um, og hon fór eftir elskarum
sínum, og gloymdi meg, sigur
HARRIN.
14 ¶ Tessvegna, sí, eg vil lokka
hana, og føra hana inn í oyðu-
na, og tala ugganarsamligani við
hana.
15 Og eg vil geva henni henn-
ara víngarðar haðani, og dal Á-
chôr-s til einar vónar dyr: og hon
skal syngja har, sum í døgum ung-
dóms síns, og sum í tí degi tá ið
hon kom upp út úr Egyptalandi.
16 Og tað skal verða á tí degi,
sigur HARRIN, *at* tú skalt kalla
meg Ĭsj´-ī; og skalt kalla meg ei
meira Bā́-ă-lī.
17 Tí at eg vil taka burt nøvnini
á Bā́-ă-līm út úr hennara munni,
og teir skulu ei meira verða mint-
ir við teirra navni.
18 Og í tí degi vil eg gera ein
sáttmála fyri teir við djór˘ akur-
sins, og við fuglar himins, og *við*
skriðkykt˘ lendisins: og eg vil
bróta bogan og svørðið og bar-
dagan burtur úr jørðini, og vil fáa
teir at liggja niðri tryggliga.
19 Og eg vil trúlova teg at
mær um ævir; ja, eg vil trúlova
teg at mær í rættvísi, og í dómi,
og í elskandi blídni, og í mis-
kunnum.
20 Eg vil enntá trúlova teg at
mær í trúskapi: og tú skalt kenna
HARRAN.
21 Og tað skal bera á í tí degi,
eg vil hoyra, sigur HARRIN, eg vil
hoyra himnarnar, og teir skulu
hoyra jørðina;
22 Og jørðin skal hoyra kornið,
og vínið, og oljuna; og tey skulu
hoyra Jĕz´-rēēl.
23 Og eg vil sáa mær hana í
jørðina; og eg vil hava miskunn
yvir hana sum hevði ikki vunnið
miskunn; og eg vil siga til *teirra*
sum vóru ikki fólk mítt, Tú *ert*
fólk mítt; og teir skulu siga, *Tú*
ert Guð mín.

KAPITUL 3

TÁ segði HARRIN við meg, Far aftur, elska eina kvinnu,

háttelskað av vini *sínum*, enn eina horinnu, samsvarandi við kærleika HARRANS mótvegis børnum Ísraels, sum hyggja til aðrar gudar, og elska karaflur av víni.

2 So eg keypti hana til mín fyri fimtan *stykkir* av silvuri, og *fyri* ein hǒ´-mĕr av byggi, og ein hálvan hǒ´-mĕr av byggi:

3 Og eg segði við hana, Tú skalt verða verandi fyri meg mangar dagar; tú skalt ei spæla skøkjan, og tú skalt ikki vera fyri *ein annan* mann: soleiðis *vil* eg eisini *vera* fyri teg.

4 Tí at børn Ísraels skulu verða verandi mangar dagar uttan ein kong, og uttan ein prins, og uttan eitt sláturoffur, og uttan eina mynd, og uttan eina ê-phōd´-ŭ, og *uttan* tĕr´-ă-phĭm:

5 Síðan skulu børn Ísraels venda aftur, og søkja HARRAN Guð sín, og Dávid sín kong; og skulu óttast HARRAN og hansara góðsku í hinum seinnu døgum.

KAPITUL 4

HOYRIÐ HARRANS orð, tit børn Ísraels: tí at HARRIN hevur eitt deilumál við íbúgvar landsins, av tí at *tað er* eingin sannleiki, ella miskunn, ella kunnleiki til Guðs í landinum.

2 Við at svørja, og lúgva, og drepa, og stjala, og fremja hordóm, bróta teir út, og blóð nemur við blóð.

3 Tí skal landið harma, og hvør tann sum býr harí skal fána, við djórum akursins, og við fuglum himins; ja, fiskar havsins eisini skulu verða tiknir burtur.

4 Tó lat ongan mann stríða, ella formana ein annan: tí at fólk títt *eru* sum teir sum stríða við prestin.

5 Tí skalt tú falla um dagin, og propheturin eisini skal falla við tær um náttina, og eg vil oyðileggja móður tína.

6 ¶ Mítt fólk er oyðilagt vegna kunnleika-trot: av tí at tú hevurt havnað kunnleika, vil eg eisini havna tær, at tú skalt eingin prestur vera fyri mær: við tað at tú hevurt gloymt lóg Guðs tíns, vil eg eisini gloyma børn tíni.

7 Sum teir vórðu øktir, so syndaðu teir ímóti mær: *tí* vil eg broyta teirra dýrd yvirí skomm.

8 Teir eta upp synd fólks míns, og teir seta sítt hjarta á sína misgerð.

9 Og har skal vera, líka *sum* fólk, líka *sum* prestur: og eg vil revsa teir fyri teirra vegir, og endurgjalda teimum teirra gerðir.

10 Tí at teir skulu eta, og ikki hava nóg mikið: teir skulu fremja hordóm, og skulu ikki økjast: av tí at teir hava hildið uppat at geva gætur eftir HARRANUM.

11 Hordómur og vín og nýtt vín taka burtur hjartað.

12 ¶ Mítt fólk spyr *um* ráð hjá bulum sínum, og teirra stavur kunnger teimum: tí at horarí˘-andin hevur volt *teimum* at fara skeivum, og teir eru farnir horandi frá *at vera* undir Guði sínum.

13 Teir sláturofra uppiá fjallatoppunum, og brenna roykilsi uppiá heyggjunum, undir eikum og øspum og álm*trø*um, av tí at skuggin harav *er* góður: tí skulu tykkara døtur fremja horarí, og tykkara makar skulu fremja hordóm.

14 Eg vil ikki revsa tykkara døtur tá ið tær fremja horarí, ella tykkara makar tá ið tær fremja hordóm: tí at teir sjálvir eru atskildir við horum, og teir sláturofra við skøkjum: tí skal fólkið, *sum* ikki skilur, falla.

15 ¶ Tó *at* tú, Ísrael, spæli skøkjan, *tó* lat ikki Judah forbrótast; og komið ikki tit at Gĭl´-găl, eiheldur farið tit niðan til Bĕth-ă´-vĕn, ella svørjið, HARRIN livir.

16 Tí at Ísrael glíður tilbakar sum ein tilbakar-glíðandi kvíga: nú vil HARRIN mata teir sum eitt lamb í einum stórum plássi.

17 Ē′-phră-ĭm *er* sameintur til avguda: lat hann vera.

18 Teirra drykkur er súrur: teir hava framt horarí áframhaldandi: hennara stjórnarar *við* skomm elska, Gevið tit.

19 Vindurin hevur bundið hana upp í sínar veingir, og teir skulu skammast uppá grund av sláturofrum sínum.

KAPITUL 5

HOYRIÐ tit hetta, O prestar; og lýðið á, tit hús Ísraels; og lænið tit oyra, O hús kongsins; tí at dómur *er* ímóti tykkum, av tí at tit hava verið ein snerra á Mizpah, og eitt garn breitt omanyvir Tā′-bôr.

2 Og frástoytararnir eru djúphugsnir *í* at fremja slátran, hóast eg *havi verið* ein formanari av teim øllum.

3 Eg kenni Ē′-phră-ĭm, og Ísrael er ikki goymdur fyri mær: tí at nú, O Ē′-phră-ĭm, fremurt tú horarí, *og* Ísrael er dálkaður.

4 Teir vilja ikki mynda sínar gerðir til at venda at Guði sínum: tí at horarí˘-andin *er* í miðjum teimum, og teir hava ikki kent HARRAN.

5 Og Ísraels hugmóð vitnar *upp* í hans andlit: tí skulu Ísrael og Ē′-phră-ĭm falla í síni misgerð; Judah eisini skal falla við teimum.

6 Teir skulu fara við sínum smáfæafylgjum og við sínum stórfæafylgjum at søkja HARRAN; men teir skulu ikki finna *hann;* hann hevur havt seg undan frá teimum.

7 Teir hava handlað sviksamligani ímóti HARRANUM: tí at teir hava gitið fremmand børn: nú skal ein mánaður upptæra teir við teirra skamtum.

8 Blásið tit kornettina í Gĭ-bē′-ŭh, *og* lúðurin í Rá′-măh: geylið hart *í* Bĕth-ā′-vĕn, eftir tær, O Benjamin.

9 Ē′-phră-ĭm skal verða oyðin á degi hartanarinnar: millum ættargreina Ísraels havi eg kunngjørt tað sum skal vissuliga verða.

10 Prinsarnir av Judah vóru líka *sum* teir sum burtflyta markið: *tí* vil eg hella út mína vreiði uppá teir sum vatn.

11 Ē′-phră-ĭm *er* kúgaður *og* brotin í dómi, av tí at hann viljugani gekk eftir boðinum.

12 Tí *vil* eg *vera* Ē′-phră-ĭm-i eins og ein mølur, og fyri Judah húsi sum rotinsemi.

13 Tá ið Ē′-phră-ĭm sá sína sjúku, og Judah *sá* sítt sár, tá fór Ē′-phră-ĭm til Assýriaran, og sendi til Jâr′-ĕb-s kongs: tó kundi hann ikki grøða tykkum, ella lekja tykkum frá tykkara sári.

14 Tí at eg *vil vera* Ē′-phră-ĭm-i eins og ein leyva, og sum ein ung leyva fyri Judah húsi: eg, *enntá* eg, vil skræða og fara avstað; eg vil taka burtur, og eingin skal bjarga *honum*.

15 ¶ Eg vil fara *og* venda aftur til pláss mítt, til teir viðganga misbrot sítt, og søkja andlit mítt: í síni nívd vilja teir søkja meg snimma.

KAPITUL 6

KOMIÐ, og latum oss venda aftur at HARRANUM: tí at hann hevur skrætt, og hann vil grøða okkum; hann hevur sligið, og hann vil binda um okkum.

2 Eftir tveim døgum vil hann endurlívga okkum: í hinum triðja degi vil hann reisa okkum upp, og vit skulu liva í hans eygsjón.

3 Tá skulu vit kenna, *um* vit fylgja áfram at kenna HARRAN: hans útfaring er fyribúgvin sum morgunin; og hann skal koma at okkum sum regnið, sum hitt seinna *og* fyrra regnið at jørðini.

4 ¶ O Ē´phră-ĭm, hvat skal eg gera tær? O Judah, hvat skal eg gera tær? tí at tykkara góðska *er* sum eitt morgun skýggj, og sum hin snimma døgg fer hon burt.

5 Tí havi eg høgt *teir* viðˆ prophetunum; eg havi vigið teir viðˆ orðum munns míns: og tínir dómar *eru eins og* ljósið *sum* fer fram.

6 Tí at eg tráaði miskunn, og ikki sláturoffur; og kunnleikan til Guðs meiri enn brennioffurˇ.

7 Men teir, eins og menn, hava misbrotið sáttmálan: har hava teir farið svikrædisligani at ímóti mær.

8 Gilead *er* ein staður av teimum ið virka misgerð, *og er* óreinkaður við blóði.

9 Og eins og fylkingar av ránsmonnum bíða eftir einum manni, *soleiðis* myrða flokkurin av prestum á veginum við samtykki: tí at teir fremja skammloysi.

10 Eg havi sæð eitt ræðuligt ting í húsi Ísraels: har *er* horaríið hjá Ē´phră-ĭm, Ísrael er dálkaður.

11 Eisini, O Judah, hann hevur sett eitt heyst til tín, tá ið eg vendi aftur fangaskapi fólks míns.

KAPITUL 7

TÁ ið eg vildi havt grøtt Ísrael, tá varð Ē´phră-ĭm-s misgerð avdúkað, og Să-mâr´ĭ-ŭ vondska: tí at teir fremja fals; og tjóvurin kemur inn, *og* troppurin av ránsmonnum herjar fyri uttan.

2 Og teir umhugsa ikki í sínum hjørtum, *at* eg minnist alla teirra vondsku: nú hava teirra egnu gerningar umgirt teir umkring; teir eru frammanfyri andliti mínum.

3 Teir gera kongin glaðan við síni vondsku, og prinsarnar við sínum lygnum.

4 Teir *eru* allir hordómsfremjarar, sum ein ovnur — hitaður av bakaranum, *hvør* gevst *við* at reisa, eftir *at* hann hevur knoðað deiggið, inntil tað verði gingið.

5 Í deginum hjá kongi várum hava prinsarnir gjørt *hann* sjúkan við fløskum av víni; hann strekti út sína hond við spottarum.

6 Tí at teir hava gjørt tilreiðar sítt hjarta eins og ein ovn, meðan teir liggja á lúri: teirra bakari svevur alla náttina; um morgunin brennur tað sum ein logandi eldur.

7 Teir eru allir heitir sum ein ovnur, og hava upptært sínar dómarar; allir teirra kongar eru falnir: *tað er* eingin teirra millum sum kallar á meg.

8 Ē´phră-ĭm, hann hevur blandað seg sjálvan millum fólksins; Ē´phră-ĭm er ein kaka, ikki vend.

9 Fremmandir hava upptært hansara styrki, og hann veit *tað* ikki: ja, grá hár eru her og har uppiá honum, hann tó veit tað ei.

10 Og Ísraels hugmóð vitnar í hans andlit: og teir venda ikki aftur til HARRANS Guðs síns, ella søkja hann fyri alt hetta.

11 ¶ Ē´phră-ĭm eisini er eins og ein býttislig dúgva, uttan hjarta: teir kalla til Egyptalands, teir fara til Assýriu.

12 Tá ið teir skulu fara, vil eg breiða mítt garn uppá teir; eg vil føra teir niður sum fuglar himinsins; eg vil aga teir, eins og teirra samkoma hevur hoyrt.

13 Vei teimum! tí at teir hava flýggjað frá mær: oyðing at teimum! av tí at teir hava misbrotist ímóti mær: hóast eg havi endurloyst teir, tó hava teir talað lygnir ímóti mær.

14 Og teir hava ikki rópt á meg við sínum hjarta, tá ið teir ýldu uppiá sínum songum: teir flykkja seg fyri korn og vín, *og* teir gera uppreist ímóti mær.

15 Hóast eg havi bundið *um og* styrkt teirra armar, tó ímynda teir mein ímóti mær.

16 Teir venda aftur, *men* ikki til hins mest Høga: teir eru eins og

ein svikaligur bogi: teirra prinsar skulu falla við ˆ svørðinum vegna øðina av teirra tungu: hetta *skal vera* teirra speireking í Egyptalandi.

KAPITUL 8

SET lúðurin til tín munn. *Hann skal koma* sum ein ørn ímóti húsi HARRANS, av tí at teir hava forbrotið mín sáttmála, og misbrotist ímóti míni lóg.

2 Ísrael skal geyla á meg, Guð mín, vit kenna teg.

3 Ísrael hevur kastað av *tað ting sum er* gott: fíggindin skal elta hann.

4 Teir hava sett upp kongar, men ikki eftir mær: teir hava gjørt prinsar, og eg vitsti *tað* ikki: av sínum silvuri og sínum gulli hava teir gjørt sær avgudar, at teir mega verða skornir av.

5 ¶ Tín kálvur, O Să-mâr´-ĭ-â, hevur kastað *teg* av; mín firtni er kynd ímóti teimum: hvør leingi *vil tað vera*, áður *enn* teir uppnáa til sakloysis?

6 Tí at frá Ísrael *var* hann eisini: arbeiðsmaðurin gjørdi hann; tí *er* hann ikki Guð: men kálvurin hjá Să-mâr´-ĭ-ŭ skal verða brotin í stykkir.

7 Tí at teir hava sáað vindin, og teir skulu heysta meldurvindin: tað hevur ongan stelk: knappurin skal einkið mjøl veita: um so verði *at* hann veiti, skulu hinir fremmandu svølgja tað upp.

8 Ísrael er svølgt upp: nú skulu teir vera Heidninganna millum sum eitt ker, í hvørjum eingin fragd *er*.

9 Tí at teir eru farnir upp til Assýriu, ein villasni einsamallur fyri seg sjálvan: Ē´-phră-ĭm hevur leigað elskarar.

10 Ja, tó *at* teir havi leigað millum tjóðirnar, vil eg nú savna teir, og teir skulu syrgja eitt sindur fyri byrðina hjá kongi prinsa.

11 Av tí at Ē´-phră-ĭm hevur gjørt mong altar til at synda, skulu altar vera honum til synd.

12 Eg havi skrivað til hansara hini miklu ting lógar mínar, *men* tey vórðu tald sum eitt fremmant ting.

13 Teir sláturofra kjøt *fyri* sláturofrini av mínum ofrum, og eta *tað; men* HARRIN góðtekur tey ikki; nú vil hann minnast teirra misgerð, og vitja teirra syndir: teir skulu venda aftur til Egyptalands.

14 Tí at Ísrael hevur gloymt sín Skapara, og byggir tempul ˘; og Judah hevur margfaldað *víg*girdar staðir: men eg vil senda ein eld omanyvir staðir hans, og hann skal upptæra slottini harav.

KAPITUL 9

FEGNAST ikki, O Ísrael, av frøi, sum *onnur* fólk: tí at tú hevurt farið horandi frá tínum Guði, tú hevurt elskað eitt endurgjald uppiá hvørjum korngólvi.

2 Gólvið og vínpersan skulu ikki mata teir, og hitt nýggja vínið skal svitast í henni.

3 Teir skulu ikki búgva í landi HARRANS; men Ē´-phră-ĭm skal venda aftur til Egyptalands, og teir skulu eta órein *ting* í Assýriu.

4 Teir skulu ikki ofra vín*offur* ˘ til HARRANS, eiheldur skulu tey vera honum toknandi: teirra sláturoffur *skulu vera* teimum sum breyðið hjá harmarum; allir, sum eta av tí, skulu verða óreinkaðir: tí at teirra breyð til teirra sál skal ikki koma inn í hús HARRANS.

5 Hvat vilja tit gera á hátíðardeginum, og á deginum av hátíð HARRANS?

6 Tí at sí, teir eru farnir, orsakað av oyðing: Egyptaland skal savna teir upp, Mĕm´-phĭs skal jarða teir: hini dámligu *plass* til teirra silvur, notur skulu eiga tey: tornir *skulu vera* í teirra tabernaklum.

7 Heimsøkingar-dagarnir eru komnir, endurgjalds-dagarnir eru komnir; Ísrael skal vita *tað:* propheturin *er* ein fivil, hin andligi maðurin *er* óður, fyri fjøldina av tíni misgerð, og hitt mikla hatur.
8 Varðmaður Ē´-phră-ĭm-s *var* hjá Guði mínum: *men* propheturin *er* ein snerra hjá einum fuglamanni á øllum hans vegum, *og* hatur í húsi Guðs hansara.
9 Teir hava djúpligani spilt *seg sjálvar,* sum á Gĭ-bē´-ŭh døgum: *tí* vil hann minnast teirra misgerð, hann vil heimsøkja teirra syndir.
10 Eg fann Ísrael sum víndrúvur í oyðuni; eg sá tykkara fedrar sum hitt frumstadna í fikutrænum við hennara fyrstu tíð: *men* teir fóru til Bā´-ăl-pē´-ôr, og atskildu seg sjálvar at *hasi* skommini; og *teirra* andstygdir vóru samsvarandi sum teir elskaðu.
11 *Hvat* Ē´-phră-ĭm *viðvíkur,* teirra dýrd skal flúgva burt eins og ein fuglur, frá føðingini, og frá móðurlívinum, og frá gitnaðinum.
12 Tó *at* teir ali upp síni børn, tó vil eg fráræna tey, *at tað skal* ei *vera* maður *eftir:* ja, vei eisini til teirra, tá ið eg fari burtur frá teimum!
13 Ē´-phră-ĭm, eins og eg sá Tў´-rŭs, *er* plantaður í einum dámligum plássi: men Ē´-phră-ĭm skal bera fram síni børn til myrðaran.
14 Gev teimum, O HARRI: hvat vilt tú geva? gev teimum eitt misføðandi móðurlív og turr bróst.
15 Øll teirra vondska *er* í Gĭl´găl: tí at har eg hataði teir: fyri vondskuna av teirra gerningum vil eg reka teir út úr húsi mínum, eg vil elska teir ei meira: allir teirra prinsar *eru* frástoytarar.
16 Ē´-phră-ĭm er sligin, teirra rót er tornað upp, teir skulu ongan ávøkst bera: ja, tó *at* teir beri fram, tó vil eg vega *enntá* hin háttelskaða *ávøkst* av teirra móðurlívi.
17 Mín Guð vil kasta teir burt, av tí at teir lýddu ikki á hann: og teir skulu vera fjakkarar tjóðanna millum.

KAPITUL 10

ÍSRAEL *er* eitt tómt víntræ, hann ber fram sjálvum sær ávøkst: samsvarandi við fjøldina av sínum ávøkstum hevur hann økt um altarini; samsvarandi við góðskuna av hansara landi hava teir gjørt frálíkar myndir.
2 Teirra hjarta er sundurbýtt; nú skulu teir verða funnir feilsamir: hann skal bróta niður teirra altarˇ, hann skal herja teirra myndir.
3 Tí at nú skulu teir siga, Vit hava ongan kong, av tí at vit óttaðust ikki HARRAN; hvat skuldi tá ein kongur gjørt fyri okkum?
4 Teir hava talað ordˇ, svørjandi falsliga í at gera ein sáttmála: soleiðis sprettur dómur upp sum eitururt í foyrunum av akrinum.
5 Íbúgvarnir av Să-mâr´-ĭ-ŭ skulu óttast uppá grund av Bĕth-ā´-vĕn-s kálvum: tí at fólkið harav skal harmast yvir hann, og tess prestar *sum* fegnaðust á honum, fyri dýrdina harhjá, av tí at hon er vikin frá tí.
6 Hann skal verða eisini borin at Assýriu *til* eina gávu til kong Jâr´-ĕb-s: Ē´-phră-ĭm skal móttaka skomm, og Ísrael skal skammast um egna ráð sítt.
7 *Hvat* Să-mâr´-ĭ-ŭ *viðvíkur,* hennara kongur er skorin av sum skúmið uppiá vatninum.
8 Hini høgu pláss eisini av Ā´-vĕn, synd Ísraels, skulu verða oyðiløgd: tornin og tistilin skulu koma upp á teirra altarum; og teir skulu siga til fjallanna, Dekkið okkum; og til heyggjanna, Fallið á okkum.
9 O Ísrael, tú hevurt syndað frá døgum Gĭ-bē´-ŭh: har stóðu

teir: bardagin í Gī-bĕ´-ŭh ímóti børnum misgerðarinnar innheintaði teir ikki.

10 *Tað er* í míni trá, at eg skuldi aga teir; og fólkið skal verða savnað ímóti teimum, tá ið teir skulu binda seg í foyrur sínar tvær.

11 Og Ē´-phră-ĭm *er eins og* ein kvíga *sum er* lærd, *og* elskar at treskja út *kornið;* men eg fór yvir uppiá hennara fagra hálsi: eg vil fáa Ē´-phră-ĭm at ríða; Judah skal pløga, *og* Jákob skal bróta sínar bøklar.

12 Sáið til tykkara sjálvs í rættvísi, heystið í miskunn; brótið upp tykkara hvíldarlendi: tí at *tað er* tíð at søkja HARRAN, til hann komi og regni rættvísi omanyvir tykkum.

13 Tit hava pløgt vondsku, tit hava heystað misgerð; tit hava etið ávøkstin av lygnum: av tí at tú leitst á tín veg, í fjøldini av tínum mektigu monnum.

14 Tí skal eitt ófriðarlæti reisast millum fólks tíns, og allir tínir festningar skulu verða herjaðir, eins og Sjăl-măn herjaði Bĕth-ăr´-bĕl á bardagadeginum: móðirin varð smekkað í stykkir omanyvir *síni* børn.

15 Soleiðis skal Beth-el gera at tykkum orsakað av tykkara miklu vondsku: í einum morgni skal kongurin av Ísrael fullkomiligani verða skorin av.

KAPITUL 11

TÁ ið Ísrael *var* eitt barn, tá elskaði eg hann, og kallaði son mín út úr Egyptalandi.

2 *Sum* teir kallaðu teir, so fóru teir frá teimum: teir sláturofraðu at Bā´-ă-lĭm, og brendu roykilsi til ristar myndir.

3 Eg lærdi Ē´-phră-ĭm eisini at ganga, takandi teir við teirra ørmum; men teir vitstu ikki, at eg grøddi teir.

4 Eg dró teir við snórum mans, við kærleiks bondum: og eg var fyri teimum sum teir sum taka av okið á teirra kjálka*bein*um, og eg legði mat at teimum.

5 ¶ Hann skal ikki venda aftur inn í Egyptaland, men Assýriarin skal vera kongur hansara, av tí at teir sýttu at venda aftur.

6 Og svørðið skal verða verandi á staðum hans, og skal upptæra greinar hans, og uppslúka *teir,* uppá grund av egnu ráðum teirra.

7 Og mítt fólk hava lyndi til at falla frá frá mær: tó *at* teir kallaðu teir til hins mest Høga, vildi eingin yvirhøvur upphevja *hann.*

8 Hvussu skal eg geva teg upp, Ē´-phră-ĭm? *hvussu* skal eg flýggja teg, Ísrael? hvussu skal eg gera teg sum Ăd´-mŭh? *hvussu* skal eg seta teg sum Zē´-bō-ĭm? mítt hjarta er vent innan í mær, mínar iðranir eru kyndar tilsaman.

9 Eg vil ikki útinna øgiligleikan av míni firtni, eg vil ikki venda aftur at oyðileggja Ē´-phră-ĭm: tí at eg *eri* Guð, og ikki maður; Hin Heilagi í miðjum tær: og eg vil ikki innfara inn í staðin.

10 Teir skulu ganga eftir HARRANUM: hann skal ýla líka *sum* ein leyva: tá ið hann skal ýla, tá skulu børnini nøtra úr vestri.

11 Teir skulu nøtra sum ein fuglur út úr Egyptalandi, og sum ein dúgva út úr Assýriulandi: og eg vil staðseta teir í teirra húsum, sigur HARRIN.

12 Ē´-phră-ĭm umringar meg íkring við lygnum, og Ísraels hús við sviki: men Judah enn ríkir við Guði, og er trúfastur við hinum heilagu.

KAPITUL 12

Ē´-PHRĂ-ĬM matar *sær* á vindi, og fylgir eftir eystanvindinum: hann dagliga økir um lygnir og oyðing; og teir gera ein sáttmála við Assýriararnar, og olja verður borin inn í Egyptaland.

2 HARRIN hevur eisini eitt deilumál við Judah, og vil revsa Jákob samsvarandi við hansara vegir; samsvarandi við hansara gerðir vil hann endurgjalda honum.

3 ¶ Hann tók bróður sín eftir hælinum í móðurlívinum, og viðˆ síni styrki hevði hann mátt við Guði:

4 Ja, hann hevði mátt yvir einglinum, og yvirvann: hann græt, og gjørdi umbønan at honum: hann fann hann *í* Beth-el, og har hann talaði við okkum;

5 Enntá HARRIN Guð herliðanna; HARRIN *er* hansara minni.

6 Tessvegna vend tú til Guðs tíns: varðveit miskunn og dóm, og bíða eftir Guði tínum áframhaldandi.

7 ¶ *Hann er* ein handilsmaður, vágskálirnar av sviki *eru* í hond hansara: hann elskar at kúga.

8 Og Ē′-phră-ĭm segði, Tó eri eg vorðin ríkur, eg havi funnið mær fram *figgjar*evni: *í* øllum mínum strevum skulu teir onga misgerð finna í mær sum *var* synd.

9 Og eg, *sum eri* HARRIN Guð tín frá Egyptalandi, vil enn fáa teg at búgva í tabernaklum, sum á hátíðar-veitslunnar-døgum.

10 Eg havi eisini talað viðˆ prophetunum, og eg havi margfalda sjónir, og brúkt líksemir, við tænastu prophetanna.

11 *Er* misgerð *í* Gilead? vissuliga, teir eru fáfongd: teir sláturofra ungtarvar í Gĭl′-găl; ja, teirra altar *eru* sum rúgvur í foyrunum av akrunum.

12 Og Jákob flýddi inn í Sýriuland, og Ísrael tænti fyri eitt vív, og fyri eitt vív gætti hann *seyð*.

13 Og viðˆ einum propheti førdi HARRIN Ísrael út úr Egyptalandi, og viðˆ einum propheti varð hann varðveittur.

14 Ē′-phră-ĭm tirraði *hann* til firtnis mest bitturliga: tí skal hann eftirlata hansara blóð uppiá honum, og hansara skemd skal Harri hansara venda aftur at honum.

KAPITUL 13

TÁ ið Ē′-phră-ĭm talaði skelvandi, upphevjaði hann seg sjálvan í Ísrael; men tá ið hann forbreyt *seg* í Bā′-ăl, doyði hann.

2 Og nú synda teir meir og meir, og hava gjørt sær brøddar myndir av sínum silvuri, *og* avgudar samsvarandi við sítt egna skil, alt samalt verkið av handverkarunum: teir siga um teir, Latið menninar, sum sláturofra, kyssa kálvarnar.

3 Tí skulu teir vera sum morgun skýggið, og eins og hin snimma døgg sum hvørvur burt, sum dumban *sum* verður rikin við meldurvindinum út av gólvinum, og sum roykurin út úr ljóaranum.

4 Tó, eg *eri* HARRIN Guð tín frá Egyptalandi, og tú skalt ongan gud kenna uttan meg: tí at *tað er* eingin frelsari umframt meg.

5 ¶ Eg kendi teg í oyðuni, í landinum av miklum turki.

6 Samsvarandi við sítt beiti, soleiðis vórðu teir mettaðir; teir vórðu mettaðir, og teirra hjarta varð upphevjað; tí hava teir gloymt meg.

7 Tí vil eg vera teimum sum ein leyva: sum ein leopardur við vegin vil eg eygleiða *teir:*

8 Eg vil møta teimum sum ein bjørn *sum er* rænd *fyri hvølpar sínar,* og vil skræða hinnu hjarta teirra, og har vil eg gloypa teir líka *sum* ein leyva: villdjórið skal skræða teir.

9 ¶ O Ísrael, tú hevurt oytt teg sjálvan; men í mær *er* tín hjálp.

10 Eg vil vera kongur tín: hvar *er nakar annar,* sum kann frelsa

teg í øllum staðum tínum? og tínir dómarar, um hvørjar tú segðirt, Gev mær ein kong og prinsar?

11 Eg gav tær ein kong í míni firtni, og tók *hann* burtur í míni vreiði.

12 Ē´-phră-ĭm-s misgerð *er* bundin upp; hansara synd *er* fjald.

13 Sorgirnar hjá eini verkjandi kvinnu skulu koma omanyvir hann: hann *er* ein óvísur sonur; tí at hann skuldi ikki steðga leingi í *plássi* frambróting barna.

14 Eg vil loysigjalda teir frá mátti gravarinnar; eg vil endurloysa teir frá deyða: O deyði, eg vil vera plágur tínar; O grøv, eg vil vera oyðing tín: iðran skal vera fjald frá mínum eygum.

15 ¶ Hóast hann veri ávakstamikil millum bróðra *sína,* skal ein eystanvindur koma, vindur HARRANS skal koma upp frá oyðuni, og hansara lind skal gerast turr, og hansara kelda skal verða tornað upp: hann skal herja fæhirðslu alra yndisligra kerja.

16 Să-mâr´-ĭ-â skal gerast oyðin; tí at hon hevur gjørt uppreist ímóti Guði sínum: teir skulu falla við^ svørðinum: teirra pinkubørn skulu verða smekkaði í stykkir, og teirra kvinnur við barn skulu verða sprettar upp.

KAPITUL 14

O ÍSRAEL, vend aftur at HARRANUM Guði tínum; tí at tú ert fallin av tíni misgerð.

2 Takið við tykkum orð˘, og vendið til HARRANS: sigið við hann, Tak burt alla misgerð, og tak ímót *okkum* náðisamliga: so vilja vit greiða kálvar varra vára.

3 Ăssj´-ûr skal ikki frelsa okkum; vit vilja ikki ríða uppiá hestum: eiheldur vilja vit siga meira til verks handa vára, *Tit eru* gudar várir: tí at í tær hin faðirleysi finnur miskunn.

4 ¶ Eg vil grøða teirra fráfall, eg vil elska teir frælsliga: tí at mín firtni er vend burtur frá honum.

5 Eg vil vera sum døggin at Ísrael: hann skal vaksa sum liljan, og kasta fram sínar røtur sum Lī´-bă-nŏn.

6 Hansara greinar skulu breiða *seg,* og hansara vakurleiki skal vera sum olivintræið, og hansara roykur sum Lī´-bă-nŏn.

7 Teir, sum búgva undir hansara skugga, skulu venda aftur; teir skulu endurlívgast *sum* kornið, og vaksa sum víntræið: tess angi *skal vera* sum vín Lī´-bă-nŏn-s.

8 Ē´-phră-ĭm *skal siga,* Hvat havi eg at gera meira við avgudar? Eg havi hoyrt *hann,* og eygleitt hann: eg *eri* sum eitt grønt aðalgranntræ. Frá mær er tín ávøkstur funnin.

9 Hvør *er* vísur, og hann skal skilja hesi *ting?* hyggin, og hann skal vita tey? tí at vegir HARRANS *eru* rættir, og hinir rættlátu skulu ganga á teimum: men misbrótararnir skulu falla hará.

JÓEL.

KAPITUL 1

ORÐ HARRANS, sum kom til Jó´-ĕl-s Pē´-thû-ĕl-s sonar.

2 Hoyrið hetta, tit gomlu menn, og lænið oyra, allir tit íbúgvar landsins. Hevur hetta verðið á tykkara døgum, ella enntá á døgum fedra tykkara?

3 Sigið tit børnum tykkara um tað, og *latið* børn tykkara *siga* børnum sínum, og teirra børn eini aðrari ætt.

4 Tað, sum kálormurin hevur

eftirlatið, hevur grashoppan etið; og tað, sum grashoppan hevur eftirlatið, hevur aldinborin etið; og tað, sum aldinborin hevur eftirlatið, hevur jarðvargurin etið.

5 Vaknið, tit drykkjumenn, og grátið; og ýlið, allir tit drekkarar av víni, uppá grund av tí nýggja víninum; tí at tað er skorið av frá tykkara munni.

6 Tí at ein tjóð er komin upp uppá land mítt, sterk, og uttan tal, hvørs tenn *eru* tenninar á eini leyvu, og hann hevur jakslatenninar á eini miklari leyvu.

7 Hann hevur lagt mítt víntræ *í* oyði, og børkað mítt fikutræ: hann hevur gjørt tað heilt bert, og kastað *tað* burt; tess greinar eru gjørdar hvítar.

8 ¶ Harma eins og ein jomfrú, gyrd við sekkjaklæði yvir ektamann ungdóms síns.

9 Matofrið og drykkofrið er skorið av frá húsi HARRANS; prestarnir, tænarar HARRANS, vena.

10 Akurin er oyddur, landið venar; tí at kornið er oytt: hitt nýggja vínið er turkað upp, oljan fánar.

11 Skammist tit, O tit jarðyrkismenn; ýlið, O tit víngarðsmenn, yvir hveitið og yvir byggið; av tí at heystið av akrinum er týnt.

12 Víntræið er tornað upp, og fikutræið fánar; granateplatræið, pálmatræið eisini, og súreplatræið, *enntá* øll trø akursins, eru følnaði: av tí at frøi er følnað burt frá mannasonunum.

13 Gyrðið tykkum, og venið, tit prestar: ýlið, tit tænarar altarsins: komið, liggið alla nátt í sekkjaklæði, tit tænarar Guðs míns: tí at matofrið og drykkofrið er afturhildið frá húsi Guðs tykkara.

14 ¶ Halgið tit eina føstu, kallið eina hátíðar-samkomu, savnið hinar elstu *og* allar íbúgvar landsins *inn í* hús HARRANS Guðs tykkara, og ropið á HARRAN,

15 Akk vegna dagsins! tí at dagur HARRANS *er* fyri hond, og sum ein oyðing frá tí Almáttuga skal hann koma.

16 Er ikki maturin skorin av frammi fyri eygum várum, *ja*, frøi og gleði frá húsi Guðs várs?

17 Sáðið er rotið undir bøklum teirra, kornløðurnar eru lagdar *í* oyði, løðurnar eru brotnar niður; tí at kornið er følnað.

18 Hvør djórini stuna! fenaðarfylgini eru ørkymlaði, av tí at tey einkið beiti hava; ja, seyðafylgini eru gjørd oyðin.

19 O HARRI, til tín vil eg rópa: tí at eldurin hevur uppslúkt oyðunnar beitir, og login hevur brent øll akursins trø.

20 Akursins djór ropa eisini á teg: tí at løkirnir av vøtnum eru tornaðir upp, og eldurin hevur uppslúkt oyðunnar beitir.

KAPITUL 2

BLÁSIÐ tit lúðurin í Zion, og ljóðið eina uppveking á mínum heilaga fjalli: lat allar íbúgvar landsins skelva: tí at dagur HARRANS kemur, tí at *hann er* nær fyri hond;

2 Ein dagur av myrkri og av niðu, ein dagur av skýggjum og av tjúkkum myrkri, sum morgunin breiddur omanyvir fjøllini: eitt mikið fólk og eitt sterkt; ikki hevur nakrantíð verið hitt líka, eiheldur skal verða meira eftir tað, *enntá* til árini hjá mongum ættum.

3 Ein eldur upptærir frammanfyri teir; og aftanfyri teir ein logi brennur: landið *er* sum Edens aldingarður frammanfyri teir, og aftanfyri teir eitt oyði reyn; ja, og einkið skal komast undan teimum.

4 Útsjóndin á teimum *er* sum útsjónd hesta; og sum hestmenn, soleiðis skulu teir renna.

5 Líka *sum* ljóðið av hervagnum á fjallatoppunum skulu teir støkka, líka *sum* ljóðið av einum

loga av eldi sum upptærir hálmin, sum eitt sterkt fólk, sett í orrustu uppstilling.

6 Frammi fyri teirra andliti skal fólkið vera nógv pínt: øll andlit skulu savna svartleika.

7 Teir skulu renna sum mektigir menn; teir skulu klintra múrin sum krígsmenn; og teir skulu herganga hvør *og* ēin á vegum sínum, og teir skulu ikki bróta raðir sínar:

8 Eiheldur skal ēin stoyta ein annan; teir skulu ganga hvør *og* ēin á rás síni: og *tá ið* teir falla uppá svørðið, skulu teir ikki verða særdir.

9 Teir skulu renna til og frá í staðinum; teir skulu renna uppiá múrinum, teir skulu klintra upp uppá húsini; teir skulu innfara inn við gluggarnar eins og ein tjóvur.

10 Jørðin skal skaka frammi fyri teimum; himnarnir skulu biva: sólin og mánin skulu verða myrk, og stjørnurnar skulu draga undan skin sítt:

11 Og HARRIN skal mæla rødd síni frammanfyri heri sínum: tí at hans leirur *er* sera mikil: tí at *hann er* sterkur sum útinnir sítt orð: tí at dagur HARRANS *er* mikil og sera ræðuligur; og hvør kann standast hann?

12 ¶ Tessvegna eisini nú, sigur HARRIN, vendið tit *enntá* til mín við øllum tykkara hjarta, og við føstu, og við gráti, og við venan:

13 Og skræðið tykkara hjarta, og ikki tykkara klæðir, og vendið at HARRANUM Guði tykkara: tí at hann *er* náðisamur og miskunnarfullur, seinur til firtnis, og av miklari blídni, og iðrar seg um hitt illa.

14 Hvør veit, *um* hann vil venda aftur og iðrast, og eftirlata eina signing eftir seg; *enntá* eitt matoffur og eitt drykkoffur at HARRANUM Guði tykkara?

15 ¶ Blásið lúðurin í Zion, halgið eina føstu, kallið ein hátíðar-savnað:

16 Savnið fólkið, halgið samkomuna, fylkið hinar elstu, savnið børnini, og tey sum súgva bróstini: lat brúðgómin fara fram út úr kamari sínum, og brúðrina út úr skemmu síni.

17 Lat prestarnar, tænarar HARRANS, gráta ímillum forhøllina og altarið, og lat teir siga, Eir tínum fólki, O HARRI, og gev ikki tín arvalut til skemdar, at hinir heidnu skuldu stjórnað yvir teimum: hvørsvegna skuldu teir siga millum fólksins, Hvar *er* Guð teirra?

18 ¶ Tá vil HARRIN vera ástbrellin um sítt land, og várkunna sínum fólki.

19 Ja, HARRIN vil svara og siga við fólk sítt, Sí, eg vil senda tykkum korn, og vín, og olju, og tit skulu verða mettaðir harvið: og eg vil ei meira gera tykkum *til* eina skemd millum hinna heidnu:

20 Men eg vil firra langt burtur frá tykkum hin norðara *her,* og vil reka hann inn í eitt land, ófruktbært og oyði, við sínum andliti mótvegis eystursjónum, og sínum aftara parti mótvegis tí ytsta sjónum, og hansara stinkur skal koma upp, og hansara ringi roykur skal koma upp, av tí at hann hevur gjørt mikil ting.

21 ¶ Óttast ikki, O land; ver glatt og fegnast: tí at HARRIN vil gera mikil ting.

22 Verið ikki rædd, tit akursins djór: tí at oyðunnar beitir spretta, tí at træið ber ávøkst sín, fikutræið og víntræið veita sína styrki.

23 So verið glað, tit børn Zions, og fegnist í HARRANUM Guði tykkara: tí at hann hevur givið tykkum hitt fyrra regn hóvsamliga, og hann vil volda at koma niður fyri tykkum regnið, hitt fyrra regn, og hitt seinna regn í hinum fyrsta *mánaði.*

24 Og gólvini skulu vera full av hveiti, og fargini skulu fløða yvir við víni og olju.
25 Og eg vil endurbøta til tykkum árini sum grashoppan hevur etið, aldinborin, og jarðvargurin, og kálormurin, mín mikli herur sum eg sendi tykkara millum.
26 Og tit skulu eta í ríkiligum, og verða mettaðir, og prísa navni HARRANS Guðs tykkara, sum hevur farið undrunarsamligani við tykkum: og fólk mítt skal aldri verða til skammar.
27 Og tit skulu vita, at eg *eri* í miðjum Ísrael, og *at* eg *eri* HARRIN Guð tykkara, og eingin annar: og fólk mítt skal aldri verða til skammar.
28 ¶ Og tað skal bera á aftaná, *at* eg vil hella út anda mín uppá alt kjøt; og synir tykkara og døtur tykkara skulu prophetera, tykkara gomlu menn skulu droyma dreymar, tykkara ungu menn skulu síggja sjónir:
29 Og eisini uppá tænararnar og uppá tænastumoyggjarnar í teimum døgum vil eg hella út anda mín.
30 Og eg vil sýna undurˇ í himnunum og á jørðini, blóð, og eld, og stólpar av royki.
31 Sólin skal verða vend í myrkur, og mánin í blóð, áður enn hin mikli og ræðuligi dagur HARRANS komi.
32 Og tað skal bera á, *at* hvørsumhelst *ið* skal kalla á navn HARRANS, skal verða bjargaður: tí at á Zion fjalli og í Jerusalem skal bjarging vera, eins og HARRIN hevur sagt; og í leivdini, hvørjar HARRIN skal kalla.

KAPITUL 3

TÍ at sí, í teimum døgum, og í teirri tíð, tá ið eg skal føra aftur fangaskapin av Judah og Jerusalem,
2 Vil eg eisini savna allar tjóðir, og vil føra teir oman í dal Jē-hō´-sjâ-phăt-s, og vil føra søk við teir har fyri fólk mítt og *fyri* mín arvalut Ísrael, hvørjar teir hava spjatt millum tjóðirnar, og býtt mítt land.
3 Og teir hava kastað lutir um fólk mítt; og hava givið ein drong fyri eina skøkju, og selt eina gentu fyri vín, at teir máttu drekka.
4 Ja, og hvat hava tit at gera við meg, O Týrus, og Zī´-dŏn, og allir breddar Palestinu? vilja tit veita mær eitt endurgjald? og um tit endurgjaldi mær, snarliga *og* fljótliga vil eg venda aftur tykkar endurgjald uppá tykkar egna høvd;
5 Av tí at tit hava tikið mítt silvur og mítt gull, og hava borið inn í templini hjá tykkum mínar frálíku, dámligu lutir:
6 Børnini eisini av Judah og børnini av Jerusalem hava tit selt Grikkunum, at tit máttu firra teir langt frá teirra marki.
7 Sí, eg vil reisa teir út úr tí plássi, hvagar tit hava selt teir, og vil venda aftur tykkar endurgjald uppá tykkar egna høvd:
8 Og eg vil selja tykkara synir og tykkara døtur inn í hondina á børnum Judah, og teir skulu selja tey til Sâ-bē´-aranna, til eitt fólk langt burturi: tí at HARRIN hevur talað *tað*.
9 ¶ Kunngerið tit hetta Heidninganna millum; Fyrireikið kríggj, vekið upp hinar mektigu menn, latið allar krígsmenninar koma nær; latið teir koma upp:
10 Berjið tykkara plógjørn yvirí svørdˇ, og tykkara urtagarðsknívar yvirí spjótˇ: latið hin veika siga, Eg *eri* sterkur.
11 Fylkið tykkum, og komið, allir tit heidnu, og savnið tykkum saman runt umkring: hagar elv hinum mektigu tínum at koma oman, O HARRI.
12 Lat hinar heidnu verða vaktar, og koma niðan til dal Jē-hō´-

sjâ-phăt-s: tí at har vil eg sita at døma allar hinar heidnu runt umkring.

13 Koyrið tit inn akurknívin, tí at heystið er staðið: komið, sleppið tykkum oman; tí at fargið er fult, fitini floyma yvir; tí at teirra vondska *er* mikil.

14 Fjøldir, fjøldir í avgerðardalinum: tí at dagur HARRANS *er* nær í avgerðardalinum.

15 Sólin og mánin skulu verða myrkjað, og stjørnurnar skulu draga undan skin sítt.

16 HARRIN eisini skal ýla út úr Zion, og mæla síni rødd frá Jerusalem; og himnarnir og jørðin skulu skelva: men HARRIN *vil vera* vón fólks síns, og styrkin hjá børnum Ísraels.

17 So skulu tit vita, at eg *eri* HARRIN Guð tykkara, dvøljandi í Zion, heilaga fjalli mínum: tá skal Jerusalem vera heilagt, og tað skulu eingir fremmandir fara ígjøgnum hana meira.

18 ¶ Og tað skal bera á í tí degi, *at* fjøllini skulu drúpa niður nýtt vín, og heyggjarnir skulu fløða við mjólk, og allir løkirnir av Judah skulu fløða við vøtnum, og ein kelda skal koma fram út úr HARRANS húsi, og skal vatna Sjït-tĭm-s dal.

19 Egyptaland skal vera ein oyða, og Ē´-dóm skal vera eitt oyði reyn, fyri harðskapin *ímóti* Judah børnum, av tí at teir hava úthelt sakleyst blóð í teirra landi.

20 Men Judah skal búgva um ævir, og Jerusalem frá ætt til ætt.

21 Tí at eg vil reinsa teirra blóð, *sum* eg havi ikki reinsað: tí at HARRIN býr í Zion.

AMOS.

KAPITUL 1

ORÐINI av Amosi, sum var millum fæflokkamanna Tē´-kô-ŭ, sum hann sá viðvíkjandi Ísrael í døgum Ŭz´-zī-ăh kongs av Judah, og í døgum Jĕr-ó´-bô-ăm-s Jó´-ăsj sonar kongs av Ísrael, tvey ár áðrenn jarðskjálvtan.

2 Og hann segði, HARRIN vil ýla frá Zion, og mæla síni rødd frá Jerusalem; og hirðanna bústaðir skulu vena, og Carmels toppur skal følna.

3 Svá sigur HARRIN; Fyri trý misbrot hjá Damascus, og fyri fýra, vil eg ikki venda burt tess *revsing;* av tí at teir hava treskt Gilead við treskingaramboðum av jarni:

4 Men eg vil senda ein eld inn í hús Hā´-zā-ĕl-s, sum skal upptæra slottˇ Bĕn-há´-dăd-s.

5 Eg vil bróta eisini sláina hjá Damascus; og skera av íbúgvan frá slætta Ā´-vĕn-s; og hann, sum heldur sprotan, frá húsi Edens: og Sýriu fólk skal fara inn í fangaskap at Kîr, sigur HARRIN.

6 ¶ Svá sigur HARRIN; Fyri trý misbrot hjá Gā´-zā, og fyri fýra, vil eg ikki venda burt tess *revsing;* av tí at teir bóru burt *til* fanga allan fangaskapin, at flýggja *teir* upp til Ē´-dóm:

7 Men eg vil senda ein eld á múrin av Gā´-zā, sum skal upptæra slottini harhjá:

8 Og eg vil skera av íbúgvan frá Ăsj´-dŏd; og hann, sum heldur veldissprotan, frá Ăsj´-kē-lŏn; og eg vil venda míni hond ímóti Ēk´-rŏn: og Philistanna leivd skal týnast, sigur Harrin GUÐ.

9 ¶ Svá sigur HARRIN; Fyri trý misbrot hjá Týˇ-rŭs, og fyri fýra, vil eg ikki venda burt tess *revsing;* av tí at teir flýggjaðu upp

allan fangaskapin til Ē′-dóm, og mintust ikki hin bróðurliga sáttmála:

10 Men eg vil senda ein eld á múrin av Tý′-rūs, sum skal upptæra slottini harhjá.

11 ¶ Svá sigur HARRIN; Fyri trý misbrot hjá Ē′-dóm, og fyri fýra, vil eg ikki venda burt tess *revsing;* av tí at hann elti bróður sín við svørðinum, og kastaði av alla várkunn, og hansara firtni skræddi viðvarandi, og hann helt síni vreiði um ævir:

12 Men eg vil senda ein eld omanyvir Tē′-măn, sum skal upptæra slottini hjá Bŏz′-răh.

13 ¶ Svá sigur HARRIN; Fyri trý misbrot hjá Ammons børnum, og fyri fýra, vil eg ikki venda burt tess *revsing;* av tí at teir hava sprett upp kvinnurnar við barn hjá Gilead, at teir máttu størra um landamark sítt:

14 Men eg vil kynda ein eld í múrinum av Răb′-băh, og hann skal upptæra slottini harhjá, við rópan á bardagadegnum, við einum ódnarvindi á meldurvindsdegnum:

15 Og teirra kongur skal fara inn í fangaskap, hann og hansara prinsar tilsaman, sigur HARRIN.

KAPITUL 2

SVÁ sigur HARRIN; Fyri trý misbrot hjá Móab, og fyri fýra, vil eg ikki venda burt tess *revsing;* av tí at hann brendi beinini av kongi Ē′-dóm-s yvirí kálk:

2 Men eg vil senda ein eld uppá Móab, og hann skal upptæra slottini hjá Kĕr′-ī-ōth: og Móab skal doyggja við levindi, við rópan, *og* við ljóði lúðursins:

3 Og eg vil skera av dómaran frá miðju tess, og vil bana øllum tess prinsum við honum, sigur HARRIN.

4 ¶ Svá sigur HARRIN; Fyri trý misbrot hjá Judah, og fyri fýra, vil eg ikki venda burt tess *revsing;* av tí at teir hava vanvirt lóg HARRANS, og hava ikki hildið hansara boð, og teirra lygnir voldu teimum at fara skeivum, eftir hvørjum teirra fedrar hava gingið:

5 Men eg vil senda ein eld omanyvir Judah, og hann skal upptæra slottini hjá Jerusalem.

6 ¶ Svá sigur HARRIN; Fyri trý misbrot hjá Ísrael, og fyri fýra, vil eg ikki venda burt tess *revsing;* av tí at teir seldu hin rættvísa fyri silvur, og hin fátæka fyri eitt par av skóm;

7 Sum stuna eftir jarðarinnar støvi á høvur hinna fátæku, og venda til viks veg hinna eyðmjúku: og ein maður og hansara faðir vilja fara inn at hini *somu* moyggj, til at halgispotta mítt heilaga navn:

8 Og teir leggja *seg* niður uppá klæðir — løgd til pant við hvørt altar, og teir drekka vín teirra fordømdu *í* húsi guds síns.

9 ¶ Tó oyddi eg Amoritarnar frammi fyri teimum, hvørs hædd *var* sum hæddin á sedris*trø*unum, og hann *var* sterkur sum eiki*trø*ini; tó oyddi eg hans ávøkst frá í erva, og hans røtur frá í neðra.

10 Eg eisini førdi tykkum upp frá Egyptalandi, og leiddi tykkum fjøruti ár gjøgnum oyðuna, at ognast land Amoritans.

11 Og eg reisti upp av tykkara sonum til prophetar, og av tykkara ungu monnum til Nazaritar. *Er tað* ikki enntá svá, O tit børn Ísraels? sigur HARRIN.

12 Men tit góvu Nazaritunum vín at drekka; og buðu prophetunum, sigandi, Propheterið ikki.

13 Sí, eg eri kroystur undir tykkum, eins og ein kerra er kroyst, *sum er* full av bundum.

14 Tí skal flóttin týnast frá tí fljóta, og hin sterki skal ikki styrkja sína kraft, eiheldur skal hin mektigi bjarga sær sjálvum:

15 Eiheldur skal hann standast, sum handfer bogan; og *hann, sum er* fljótur til fóts, skal ikki bjarga *sær sjálvum:* eiheldur skal hann, sum ríður hestin, bjarga sær sjálvum.

16 Og *hann, sum er* mótsamur hinna mektigu millum, skal flýggja burt nakin á tí degi, sigur HARRIN.

KAPITUL 3

HOYRIÐ hetta orð, sum HARRIN hevur talað ímóti tykkum, O børn Ísraels, ímóti allari familjuni sum eg førdi upp frá Egyptalandi, sigandi,

2 Tykkum einans havi eg kent av øllum familjum jarðarinnar: tí vil eg revsa tykkum fyri allar tykkara misgerðir.

3 Kunnu tveir ganga saman, uttan teir veri samdir?

4 Vil ein leyva ýla í skóginum, tá ið hon onga bráð hevur? vil ein ung leyva skríggja úr sínum helli, um hon einkið havi fingið?

5 Kann ein fuglur falla inn í eina fellu uppiá jørðini, har eingin snerra *er* til hansara? skal *ēin* taka upp eina fellu frá jørðini, og einkið hava fingið yvirhøvur?

6 Skal ein lúður verða blástur í staðinum, og fólkið ei verða rædd-ir? skal ilt vera í einum staði, og HARRIN ei hevur gjørt *tað?*

7 Vissuliga, Harrin GUÐ vil einkið gera, uttan hann opinberar sítt loyndarmál yvirfyri tænarum sínum prophetunum.

8 Leyvan hevur ýlt, hvør vil ikki óttast? Harrin GUÐ hevur talað, hvør kann annað *enn* prophetera?

9 ¶ Kunngerið í slottunum í Ásj´-dõd, og í slottunum í Egyptalandi, og sigið, Fylkið tykkum uppiá fjøllunum av Să-mâr´-ī-ŭ, og skoðið hini miklu ófriðarlætir í miðjum tí, og hinar kúgaðu í miðjum tí.

10 Tí at teir skyna ikki at gera rætt, sigur HARRIN, sum rúgva upp harðskap og rán í slottum sínum.

11 Tessvegna, svá sigur Harrin GUÐ; Ein mótstandari *skal vera* enntá rundan um landið; og hann skal føra niður tína styrki frá tær, og tíni slott skulu verða herjað.

12 Svá sigur HARRIN; Eins og hirðin tekur út úr munninum á leyvuni tveir leggir, ella eitt petti av einum oyra; so skulu børn Ísraels verða tiknir út, sum búgva í Să-mâr´-ī-ŭ í hjørninum av eini song, og í Damascus *í* eini bík.

13 Hoyrið tit, og vitnið í húsi Jákobs, sigur Harrin GUÐ, Guð herliðanna,

14 At á tí degi sum eg skal heimsøkja misbrotini hjá Ísrael uppá hann, vil eg eisini heimsøkja altarini av Beth-el: og hornini av altarinum skulu verða skorin av, og falla til jarðarinnar.

15 Og eg vil sláa vetrarhúsið við summarhúsinum; og fílabeinshúsini skulu farast, og hini miklu hús skulu fáa ein enda, sigur HARRIN.

KAPITUL 4

HOYRIÐ hetta orð, tit Bá-sjăn-s kýr, sum *eru* á Să-mâr´-ī-ŭ fjalli, sum kúga hinar fátæku, sum knúsa hinar tørvandi, sum siga til teirra meistarar, Fáið til vegar, og latum okkum drekka.

2 Harrin GUÐ hevur svorið við sín heilagleika, at sí, teir dagar skulu koma uppá tykkum, sum hann vil taka tykkum burtur við húkum, og tykkar eftirkoming við fiskhúkum.

3 Og tit skulu fara út við sprungurnar, hvør *kúgv ígjøgnum tað sum er* frammanfyri henni; og tit skulu kasta *tær* inn í slottið, sigur HARRIN.

4 ¶ Komið til Beth-el, og misbrótist; í Gĭl′-găl margfaldið misbrot; og førið tykkara sláturoffur hvønn morgun, *og* tykkara tíggjundir eftir trý ár:

5 Og ofrið eitt takkarveitanarsláturoffur við súrdeiggi, og lýsið *og* almannakunngerið tey fríu ofrini: tí at hetta líkar tykkum, O tit børn Ísraels, sigur Harrin GUÐ.

6 ¶ Og eg eisini havi givið tykkum reinleika av tonnum í øllum staðum tykkara, og trot á breyði í øllum plássum tykkara: tó hava tit ikki vent aftur at mær, sigur HARRIN.

7 Og eisini eg havi hildið aftur regnið frá tykkum, tá ið *tað vóru* enn tríggir mánaðir til heystið: og eg voldi tí at regna uppá ein stað, og voldi tí ikki at regna uppá ein annan stað: ein stykki varð regnað uppá; og tað stykkið, hvaruppá tað regnaði ikki, følnaði.

8 So tveir *ella* tríggir staðir reikaðu at einum staði, at drekka vatn; men teir vórðu ikki nøktaðir: tó hava tit ikki vent aftur at mær, sigur HARRIN.

9 Eg havi sligið tykkum við svartaroða og gulnan: tá ið tykkara urtagarðar og tykkara víngarðar og tykkara fikutrø og tykkara olivintrø øktust, uppgloypti kálormurin *tey:* tó hava tit ikki vent aftur at mær, sigur HARRIN.

10 Eg havi sent tykkara millum drepsóttina eftir háttarlagi Egyptalands: tykkara ungu menn havi eg vigið við svørðinum, og havi tikið burt tykkara hestar; og eg havi fingið stinkin av tykkara leirum at koma upp at tykkara nasum: tó hava tit ikki vent aftur at mær, sigur HARRIN.

11 Eg havi kollrent *summar* av tykkum, eins og Guð kollrendi Sodomu og Gō-mŏr′-rŭh, og tit vóru sum ein eld-kyndil ryktur út úr brennuni: tó hava tit ikki vent aftur at mær, sigur HARRIN.

12 Tessvegna, svá vil eg gera at tær, O Ísrael: *og* av tí at eg vil gera hetta at tær, fyribúgv *teg* at møta tínum Guði, O Ísrael.

13 Tí at sí, hann sum myndar fjøllini, og skapar vindin, og kunngerir manni hvat hans hugsan *er,* sum ger morgunin *til* myrkur, og treður uppiá hinum høgu plássum jarðarinnar, HARRIN, Guð herliðanna, *er* hans navn.

KAPITUL 5

HOYRIÐ tit hetta orð, sum eg taki upp ímóti tykkum, *enntá* eitt harmljóð, O hús Ísraels.

2 Jomfrú Ísraels er fallin; hon skal ei meira rísa: hon er yvirgivin uppiá landi sínum; *tað er* eingin at reisa hana upp.

3 Tí at svá sigur Harrin GUÐ; Staðurin, sum fór út *við* ̂ túsund, skal eftirlata hundrað; og tað, sum fór fram *við* ̂ hundrað, skal eftirlata tíggju, til Ísraels húss.

4 ¶ Tí at svá sigur HARRIN við Ísraels hús, Søkið tit meg, og tit skulu liva:

5 Men søkið ikki Beth-el, ella innfarið inn í Gĭl′-găl, og farið ikki yvir til Bēēr′-sjĕ-bŭ: tí at Gĭl′-găl skal vissuliga fara inn í fangaskap, og Beth-el skal koma til einkiðs.

6 Søkið HARRAN, og tit skulu liva; at ikki hann bróti út líka *sum* eldur í húsi Jósephs, og upptæri *tað,* og *tað veri* eingin at sløkkja *hann* í Beth-el.

7 Tit, sum venda dómi til malurt, og lætta av rættvísi á jørðini,

8 *Søkið hann* sum ger sjeystjørnurnar og Ō′-rĭ-ŏn, og vendir skugga deyðans yvirí morgunin, og ger dagin myrkan við nátt: sum kallar eftir vøtnum havsins, og hellir tey út uppá ásjón jarðarinnar: HARRIN *er* hans navn:

9 Sum styrkir hinar herjaðu ímóti tí sterka, so at teir herjaðu skulu koma ímóti vígvirkinum.

10 Teir hata hann sum hartar
í portrinum, og teimum stendst
við hann sum talar reiðiliga.
11 Við tað, tessvegna, at tykk-
ara traðkan *er* uppá hin fátæka,
og tit taka frá honum byrðir av
hveiti: tit hava bygt hús˘ av høgd-
um steini, men tit skulu ikki búgva
í teimum; tit hava plantað dám-
ligar víngarðar, men tit skulu ikki
drekka vín úr teimum.
12 Tí at eg kenni tykkara marg-
faldu misbrot og tykkara mektigu
syndir: teir níva hin rættvísa, teir
taka eitt mutur, og teir venda til
viks hinar fátæku í portrinum *frá*
teirra rætti.
13 Tí skal hin hygni halda tøgn
í teirri tíðini; tí at tað *er* ein ónd
tíð.
14 Søkið gott, og ikki ilt, at tit
mega liva: og so HARRIN, Guð
herliðanna, skal vera við tykkum,
eins og tit hava talað.
15 Hatið hitt illa, og elskið
tað góða, og grundfestið dóm í
portrinum: vera má, at HARRIN
Guð herliðanna vil vera náðisam-
ur at leivd Jósephs.
16 Tessvegna sigur HARRIN,
Guð herliðanna, Harrin, svá; Ven-
an *skal verða* í øllum gøtum; og
teir skulu siga í øllum alfaravegunum, Akk! akk! og teir skulu
kalla jarðyrkismannin til syrgjan-
ar; og slíkar, sum eru kønir í
harman, til venanar.
17 Og í øllum víngørðum *skal*
vera venan: tí at eg vil fara ígjøgn-
um teg, sigur HARRIN.
18 Vei tykkum sum tráa dag
HARRANS! til hvørs endamáls *er*
tað hjá tykkum? dagur HARRANS
er myrkur, og ikki ljós.
19 Sum um ein maður flýggj-
aði frá eini leyvu, og ein bjørn
møtti honum; ella fór inn í húsið,
og lenaði sína hond á veggin, og
ein høggormur beit hann.
20 *Skal* ikki dagur HARRANS
vera myrkur, og ikki ljós? enntá
sera myrkur, og eingin bjartleiki
í honum?
21 ¶ Eg hati, eg haldi hánt
um tykkara hátíðar-dagar, og eg
vil ikki lukta á tykkara hátíðar-
savnaðum.
22 Tó *at* tit ofri mær brenni-
offur˘ og tykkara matoffur˘, vil eg
ikki taka við *teimum:* eiheldur vil
eg geva gætur eftir friðofrunum
av tykkara feitu djórum.
23 Tak tú burtur frá mær ljóð-
ið av sangum tínum; tí at eg vil
ikki hoyra melodiin av stórfiólum
tínum.
24 Men lat dóm renna niður
sum vøtn, og rættvísi sum ein
mektigan streym.
25 Hava tit ofrað mær slátur-
offur˘ og offur˘ í oyðuni *í* fjøruti
ár, O Ísraels hús?
26 Men tit hava borið taber-
nakkul Molochs tykkara og Chī´-
ŭn — tykkara myndir; stjørnu
guds tykkara, sum tit gjørdu til
tykkara sjálvs.
27 Tí vil eg elva tykkum at fara
inn í fangaskap handan Damas-
cus, sigur HARRIN, hvørs navn *er*
Guð herliðanna.

KAPITUL 6

VEI til teirra *sum eru* við ró í
Zion, og líta á Să-mâr´-ĭ-ŭ fjall,
sum eru nevndir fremstir hjá tjóð-
unum, til hvørs Ísraels hús kom!
2 Farið tit til Căl´-nēh, og vit-
ið; og haðani frá farið tit til Há´-
măth hins mikla: so farið oman
til Gáth Philistanna: *veri teir seg*
betri enn hesi kongadømini? ella
teirra landamark miklari enn
tykkara landamark?
3 Tit sum seta langt burtur
hin ónda dag, og volda harðskap-
arins sæti at koma nær;
4 Sum liggja uppiá songum av
filabeini, og strekkja seg uppiá
legum sínum, og eta lombini úr
fylginum, og kálvarnar úr miðj-
um fjósinum;

5 Sum njóra til ljóðið á fiólini, *og* uppfinna til sín sjálvs tónleiksljóðførir, líka *sum* Dávid;
6 Sum drekka vín í skálum, og salva seg við hinum aðal smyrslum: men teir eru ikki harmir um nívd Jósephs.
7 ¶ Tessvegna, nú skulu teir fara *til* fanga við hinum fyrstu sum fara *til* fanga; og veitsluborðhaldið hjá teimum sum strektu seg skal verða burtflutt.
8 Harrin GUÐ hevur svorið við seg sjálvan, sigur HARRIN Guð herliðanna, Mær stendst við avbærni Jákobs, og hati hansara slottˇ: tí vil eg flýggja upp staðin við øllum sum er harí.
9 Og tað skal bera á, um har verði verandi tíggju menn í ēinum húsi, at teir skulu doyggja.
10 Og faðirbróðirin hjá einum manni skal taka hann upp, og hann, sum brennur hann, til at føra út beinini út úr húsinum, og skulu siga við hann sum *er* við síðurnar av húsinum, *Er tað* enn *nakar* hjá tær? og hann skal siga, Nei. Tá skal hann siga, Halt tungu tíni: tí at vit mega ikki nevna navn HARRANS.
11 Tí at sí, HARRIN býður, og hann vil sláa hitt mikla húsið við rivum, og tað lítla húsið við klivum.
12 ¶ Skulu hestar renna uppiá klettinum? vil *ēin* pløga *har* við oksum? tí at tit hava vent dóm yvirí gall, og rættvísis ávøkstin yvirí malurt:
13 Tit sum fegnast í einum tingi av ongum *virði,* sum siga, Hava vit ikki tikið til okkum hornˇ við okkara egnu styrki?
14 Men sí, eg vil reisa upp ímóti tykkum eina tjóð, O Ísraels hús, sigur HARRIN Guð herliðanna; og teir skulu níva tykkum frá innfaringini inn av Há´-măth at oyðunnar á.

KAPITUL 7

SVÁ hevur Harrin GUÐ sýnt mær; og sí, hann myndaði grashoppur í byrjanini av spíringini upp av tí seinna vøkstrinum; og sí, *tað var* hin seinni vøksturin eftir kongsins sláttir.
2 Og tað bar á, *at* tá ið tey høvdu gjørt lok á at eta landsins gras, tá segði eg, O Harri GUÐ, fyrigev, eg bøni teg: viðˆ hvørjumP skal Jákob reisa *seg?* tí at hann *er* lítil.
3 HARRIN iðraði *seg* um hetta: Tað skal ikki verða, sigur HARRIN.
4 ¶ Svá hevur Harrin GUÐ sýnt mær: og sí, Harrin GUÐ kallaði til at stríða viðˆ eldi, og hann upptærdi hitt mikla djúp, og át upp ein part.
5 Tá segði eg, O Harri GUÐ, gevst, eg bøni teg: viðˆ hvørjumP skal Jákob reisa seg? tí at hann *er* lítil.
6 HARRIN iðraði *seg* um hetta: Hetta eisini skal ikki verða, sigur Harrin GUÐ.
7 ¶ Svá sýndi hann mær: og sí, Harrin stóð uppiá einum múri, *gjørdum* eftir einum loddsnóri, við einum loddsnóri í síni hond.
8 Og HARRIN segði við meg, Amos, hvat sært tú? Og eg segði, Ein loddsnór. Tá segði Harrin, Sí, eg vil seta ein loddsnór í miðjuna av fólki mínum Ísrael: eg vil ikki aftur fara framvið teimum meira:
9 Og hini høgu pláss Ísaaks skulu verða oyðin, og Ísraels halgidómar skulu verða lagdir *í* oyði; og eg vil rísa ímóti Jĕr-ó´-bô-ăm-s húsi við svørðinum.
10 ¶ Tá sendi Ă-mă-zī´-ăh, prestur Beth-el-s, til Jĕr-ó´-bô-ăm-s kongs av Ísrael, sigandi, Amos hevur samansvorið ímóti tær í miðjum húsi Ísraels: landið er ikki ført fyri at bera øll orð hansara.
11 Tí at svá sigur Amos, Jĕr-ó´-bô-ăm skal doyggja viðˆ svørðinum, og Ísrael skal vissuliga

verða leitt burt *til* fanga út úr egna landi sínum.

12 Eisini segði Ă-mă-zī´-ăh við Amos, O tú síggjari, far, flýggja tær burt inn í land Judah, og har et breyð, og prophetera har:

13 Men prophetera ikki aftur meira í Beth-el: tí at tað *er* kongsins bønhús, og tað *er* kongsins høll.

14 ¶ Tá svaraði Amos, og segði til Ă-mă-zī´-ăh, Eg *var* eingin prophetur, eiheldur *var* eg prophets sonur; men eg *var* ein fæflokkamaður, og ein savnari av morberja frukt:

15 Og HARRIN tók meg sum eg fylgdi fylginum, og HARRIN segði við meg, Far, prophetera at fólki mínum Ísrael.

16 ¶ Nú tessvegna, hoyr tú HARRANS orð: Tú sigurt, Prophetera ikki ímóti Ísrael, og slepp ikki *tínum orði* ímóti húsi Ísaaks.

17 Tessvegna, svá sigur HARRIN; Tín ektakona skal verða ein skøkja í staðinum, og tínir synir og tínar døtur skulu falla viðˆ svørðinum, og títt land skal verða sundurdeilt viðˆ *mát*linju; og tú skalt doyggja í einum óreinkaðum landi: og Ísrael skal vissuliga fara inn í fangaskap fram úr landi sínum.

KAPITUL 8

SVÁ hevur Harrin GUÐ sýnt mær: og sí ein tæga av summar frukt.

2 Og hann segði, Amos, hvat sært tú? Og eg segði, Eina tægu av summar frukt. Tá segði HARRIN við meg, Endin er komin omanyvir mítt Ísraels fólk; eg vil ikki aftur fara framvið teimum meira.

3 Og sangir tempulsins skulu vera ýlanir í tí degi, sigur Harrin GUÐ: *tað skulu vera* mangir deyðir kroppar í hvørjum plássi; teir skulu kasta *teir* út við tøgn.

4 ¶ Hoyrið hetta, O tit sum svølgja upp hin tørvandi, enntá *fyri* at fáa hinar ørmu landsins at víkja,

5 Sigandi, Nær vil nýmánin verða farin, at vit mega selja korn? og sabbaturin, at vit mega seta fram hveiti, gerandi ē´-phâh-ina lítla, og sjē´-kŭl-in stóran, og falsandi vágskálirnar viðˆ sviki?

6 At vit mega keypa hinar ørmu fyri silvur, og hin tørvandi fyri eitt par av skóm; *ja,* og selja tað vrakaða av hveitinum?

7 HARRIN hevur svorið viðˆ avbærni Jákobs, Vissuliga, eg vil aldri gloyma nøkur av teirra verkum.

8 Skal ikki landið nøtra fyri hetta, og hvør tann vena sum býr harí? og tað skal rísa upp heil-*veg*is sum ein flóð; og tað skal verða kastað út og druknað, sum *viðˆ* Egyptalands flóð.

9 Og tað skal bera á í tí degi, sigur Harrin GUÐ, at eg vil elva sólini at fara niður á middegi, og eg vil myrkja jørðina á skæra deginum:

10 Og eg vil venda tykkara hátíðir yvirí venan, og allar tykkara sangir yvirí harman; og eg vil føra upp sekkjaklæði uppá allar lendar, og skallutleika uppá hvørt høvd; og eg vil gera tað sum veningina yvir ein ēinasta *son,* og tess enda sum ein beiskan dag.

11 ¶ Sí, teir dagar koma, sigur Harrin GUÐ, at eg vil senda eina hungursneyð í landinum, ikki eina hungursneyð breyðs, ella ein torsta eftir vatni, men tess at hoyra orðini hjá HARRANUM:

12 Og teir skulu reika frá sjógvi til sjóvar, og frá norðan enntá til eystan, teir skulu renna til og frá *fyri* at søkja orð HARRANS, og skulu ikki finna *tað*.

13 Á tí degi skulu hinar føgru jomfrýr og hinir ungir menn svinna av torsta.

14 Teir sum svørja við syndina hjá Să-mâr´-ĭ-ŭ, og siga, Tín gudur, O Dán, livir; og, Háttarlagið hjá Bēēr´-sjĕ-bŭ livir; enntá teir skulu falla, og aldri rísa upp aftur.

KAPITUL 9

EG sá Harran standandi uppi á altarinum: og hann segði, Slá duratræ hurðarinnar, at stólparnir mega skaka: og sker teir í høvdið, allar av teimum; og eg vil vega hin síðsta av teimum við svørðinum: hann, sum flýggjar av teimum, skal ei flýggja burt; og hann, sum kemst undan av teimum, skal ei verða bjargaður.

2 Hóast teir gravi inn í helviti, haðani skal hond mín taka teir; hóast teir klúgvi upp til himins, haðani vil eg føra teir niður:

3 Og tó *at* teir fjali seg á toppi Carmels, vil eg leita og taka teir av haðani; og tó *at* teir verði *seg* fjaldir frá míni eygsjón á botni havsins, haðani vil eg bjóða høggorminum, og hann skal bíta teir:

4 Og tó *at* teir fari inn í fangaskap frammi fyri fíggindum sínum, haðani vil eg bjóða svørðinum, og tað skal bana teimum: og eg vil seta míni eygu uppá teir til ilt, og ikki til gott.

5 Og Harrin GUÐ herliðanna *er* hann sum nemur við landið, og tað skal smelta; og allir, sum búgva harí, skulu vena: og tað skal rísa upp heil*veg*is sum ein flóð; og skal verða druknað, sum *við* Egyptalands flóð.

6 *Tað er* hann sum byggir sínar hæddir í himninum, og hevur grundlagt sína fylking á jørðini; hann sum kallar eftir havsins vøtnum, og hellir tey út uppá ásjón jarðarinnar: HARRIN *er* hans navn.

7 *Eru* tit ikki sum børn hjá Ê-thĭ-ō´-pĭ-arunum yvirfyri mær, O Ísraels børn? sigur HARRIN. Havi ikki eg ført upp Ísrael út úr Egyptalandi? og Philistarnar frá Căph´-tôr, og Sýriu*lending*arnar frá Kîr?

8 Sí, eygu Harrans GUÐS *eru* uppá hitt syndafulla kongadømi, og eg vil oyða tað oman av ásjón jarðarinnar; uttan *tað,* at eg vil ikki aldeilis oyða hús Jákobs, sigur HARRIN.

9 Tí at sí, eg vil ábjóða, og eg vil sálda Ísraels hús millum alra tjóða, líka sum *korn* verður sáldað í eini sílu, tó skal ikki hitt minsta frækorn falla uppá jørðina.

10 Allir syndarar fólks míns skulu doyggja við svørðinum, sum siga, Hitt illa skal ikki innheinta, ella koma okkum á møti.

11 ¶ Á tí degi vil eg reisa upp Dávids tabernakkul sum er fallið, og loka upp rivur tess; og eg vil reisa upp toftir hans, og eg vil byggja tað sum í døgunum í forðum:

12 At teir mega ognast leivd Ē´-dóm-s, og alra hinna heidnu, sum eru kallaðir við navni mínum, sigur HARRIN sum hetta ger.

13 Sí, teir dagar koma, sigur HARRIN, at pløgingarmaðurin skal innheinta innheystaran, og treðarin av víndrúvum hann sum sáar sáð; og fjøllini skulu drúpa søtt vín, og allir heyggjarnir skulu bráðna.

14 Og eg vil føra aftur fangaskapin av Ísraels fólki mínum, og teir skulu byggja hinar oydnu staðir, og búgva í *teim;* og teir skulu planta víngarðar, og drekka vínið harúr; teir skulu eisini gera urtagarðar, og eta ávøkstin av teim.

15 Og eg vil planta teir uppiá landi teirra, og teir skulu ei meira verða hálaðir upp út úr landi sínum, sum eg havi givið teimum, sigur HARRIN Guð tín.

ÓBADIAH.

SJÓNIN hjá Ó-bă-dī´-ăh. Svá sigur Harrin GUÐ viðvíkjandi Ē´-dóm; Vit hava hoyrt eitt graml frá HARRANUM, og ein umboðsmaður er sendur hinna heidnu millum, Reisist tit, og latum okkum rísa upp ímóti henni í bardaga.

2 Sí, eg havi gjørt teg lítlan hinna heidnu millum: tú ert stórliga vanvirdur.

3 ¶ Stoltleiki hjarta tíns hevur teipað teg, tú sum býrt í klivum klettarins, hvørs bústaður *er* høgur; sum sigur í hjarta sínum, Hvør skal føra meg niður til jørðina?

4 Tó *at* tú upphevji *teg sjálvan* sum ørnin, og tó *at* tú seti títt reiður millum stjarnanna, haðani vil eg føra teg niður, sigur HARRIN.

5 Um tjóvar komu til tín, um ránsmenn um nátt*ina*, (hvør ert tú skorin av!), vildu teir ikki havt stjolið, til teir høvdu nóg mikið? um vínberjasavnararnir komu til tín, vildu teir ikki eftirlatið *nøkur* vínber?

6 Hvør eru *lutirnir* hjá Esavi grundaðir út! *hvør* eru hansara fjaldu lutir sneytaðir upp!

7 Allir menninir av tíni samgongu hava ført teg *enntá* til landamarkið: menninir, sum vóru í friðs*tøðu* við teg, hava teipað teg, *og* havt yvirvág ímóti tær; *teir, sum eta* breyð títt, hava lagt eitt sár undir teg: *tað er* eingin vitska í honum.

8 Skal eg ikki á tí degi, sigur HARRIN, enntá oyða vís*menn*inar úr Ē´-dóm, og vitsku av fjalli Esavs?

9 Og tínir mektigu *menn,* O Tē´-măn, skulu verða mótfalnir, til tess endamáls at hvør *og* ēin av fjalli Esavs má verða skorin av við^ slátran.

10 ¶ Fyri *tín* harðskap ímóti bróður tínum Jákobi, skal skomm dekka teg, og tú skalt verða skorin av um ævir.

11 Á tí degi sum tú stóðst hīnumegin, á tí degi sum hinir fremmandu bóru burt *til* fanga hansara *her*styrkir, og útlendingar innfóru inn í hansara portur^ og kastaðu lutir yvir Jerusalem, *vart* enntá tú sum ēin av teimum.

12 Men tú skuldirt ikki havt hugt á degi bróðurs tíns á tí degi sum hann gjørdist ein fremmandur; eiheldur skuldirt tú havt fegnast yvir Judah børn á deginum av teirra oyðing; eiheldur skuldirt tú havt talað hugmóðiga á degi neyðarstandsins.

13 Tú skuldirt ikki havt innfarið inn í portrini hjá mínum fólki á deginum av teirra skaðatilburði; ja, tú skuldirt ikki havt hugt á teirra nívd á deginum av teirra skaðatilburði, ella havt lagt *hendur* á teirra *fíggjar*evni á deginum av teirra skaðatilburði;

14 Eiheldur skuldirt tú havt staðið í krossveginum, at skera av teir av hansara sum komust undan; eiheldur skuldirt tú havt flýggjað upp teir av hansara sum vóru eftir á degi neyðarstandsins.

15 Tí at dagur HARRANS *er* nær uppiá øllum hinum heidnu: eins og tú hevurt gjørt, skal tað verða gjørt at tær: títt endurgjald skal venda aftur uppá títt egna høvd.

16 Tí at eins og tit hava drukkið uppiá mínum heilaga fjalli, *soleiðis* skulu allir hinir heidnu drekka áframhaldandi, ja, teir skulu drekka, og teir skulu svølgja niður, og teir skulu vera sum um teir høvdu ikki verið.

17 ¶ Men uppiá Zion fjalli skal vera útfrían, og har skal vera heilagleiki; og Jákobs hús skal ognast ognir sínar.

18 Og Jákobs hús skal vera ein eldur, og Jósephs hús ein logi, og

Esavs hús til hálm, og teir skulu kynda í teimum, og upptæra teir; og tað skulu ikki vera *nakrir* eftirverandi av húsi Esavs; tí at HARRIN hevur talað *tað*.

19 Og *teir úr* sunnan skulu ognast fjall Esavs; og *teir av* slættanum Philistarnar: og teir skulu ognast Ē´-phră-ĭm-s akrar, og Să-mâr´-ĭ-ŭ akrar: og Benjamin *skal ognast* Gilead.

20 Og fangaskapurin av hesum herliðinum av Ísraels børnum *skal ognast* tað hjá Cānaanitunum, *enntá* at Zăr´-ē-phâth; og fangaskapurin av Jerusalem, sum *er* í Sē-phâr´-ăd, skal *taka* til ognar staðir suðursins.

21 Og frelsarar skulu koma niðan á Zion fjall at døma fjall Esavs; og kongadømið skal vera HARRANS.

JÓNAH.

KAPITUL 1

NÚ, orð HARRANS kom at Jónah Ă-mĭt´-tâi-s syni, sigandi,

2 Reis *teg*, far til Nĭn´-ē-vēh, handa mikla stað, og geyla ímóti honum; tí at teirra vondska er komin upp framfyri meg.

3 Men Jónah reis upp til *tess* at flýggja at Tarsjisj frá nærveru HARRANS, og fór oman til Joppa; og hann fann eitt skip, farandi til Tarsjisj: so hann rindaði takstin harhjá, og fór niður í tað, til at fara við teimum at Tarsjisj frá nærveru HARRANS.

4 ¶ Men HARRIN sendi út ein miklan vind á sjógvin, og har var ein mektigur ódnarvindur á sjónum, so at skipið var líkt til at verða brotið.

5 Tá vóru sjómenninir ræddir, og geylaðu hvør maður á gud sín, og kastaðu út vørurnar, sum *vóru* í skipinum, inn í sjógvin, til at lætta *tað* fyri tær. Men Jónah var farin niður í síðurnar av skipinum; og hann lá, og var í fasta svøvni.

6 So skipsførarin kom til hansara, og segði við hann, Hvat meinart tú, O svøvnskarvur? reis *teg*, kalla uppá Guð tín, um so veri at Guð vilji tonkja uppá okkum, at vit farist ei.

7 Og teir søgdu hvør *og* ēin til felaga sín, Komið, og latum okkum kasta lutir, at vit mega vita fyri hvørs grund hetta illa *er* uppiá okkum. So teir kastaðu lutir, og luturin fell uppá Jónah.

8 Tá søgdu teir við hann, Sig okkum, vit biðja teg, fyri hvørs grund hetta illa *er* uppiá okkum; Hvat *er* yrki títt? og hvaðani kemurt tú? hvat *er* land títt? og av hvørjum fólki *ert* tú?

9 Og hann segði við teir, Eg *eri* ein Hebrēari; og eg óttist HARRAN, Guð himins, sum hevur gjørt sjógvin og tað turra *landið*.

10 Tá vórðu menninir framúrliga ræddir, og søgdu við hann, Hví hevurt tú gjørt hetta? Tí at menninir vitstu, at hann flýddi frá nærveru HARRANS, av tí at hann hevði sagt teimum.

11 ¶ Tá søgdu teir við hann, Hvat skulu vit gera tær, at sjógvurin má verða róligur at okkum? tí at sjógvurin arbeiddi, og var ódnarvindsligur.

12 Og hann segði við teir, Takið meg upp, og kastið meg fram inn í sjógvin; so skal sjógvurin verða róligur at tykkum: tí at eg veit, at fyri mína skyld *er* hesin mikli ódnarvindurin uppiá tykkum.

13 Hóast hetta, menninir róðu hart *fyri* at føra *tað* til landsins; men teir fingu ikki: tí at sjógvurin arbeiddi, og var ódnarvindsligur ímóti teimum.

14 Hvørsvegna teir geylaðu á HARRAN, og søgdu, Vit bøna teg, O HARRI, vit bøna teg, lat okkum ikki farast fyri lív hesa mans, og legg ikki uppá okkum sakleyst blóð: tí at tú, O HARRI, hevurt gjørt sum tað hóvaði tær.

15 So teir tóku upp Jónah, og kastaðu hann fram inn í sjógvin: og sjógvurin gavst við síni leikan í.

16 Tá óttaðust menninir HARRAN ovurhondsliga, og ofraðu eitt sláturoffur at HARRANUM, og strongdu heitir.

17 ¶ Nú, HARRIN hevði fyribúgvið ein stóran fisk at svølgja upp Jónah. Og Jónah var í búkinum á fiskinum tríggjar dagar og tríggjar nætur.

KAPITUL 2

TÁ bað Jónah at HARRANUM Guði sínum úr kviði fisksins,

2 Og segði, Eg geylaði uppá grund av míni nívd á HARRAN, og hann hoyrdi meg; út úr helvitis kviði eg geylaði, *og* tú hoyrdirt mína rødd.

3 Tí at tú hevðirt kastað meg inn í djúpið, í miðjum sjógvunum; og flóðirnar umringaðu meg umkring: allar tínar bylgjur og tínar bárur fóru yvir meg.

4 Tá segði eg, Eg eri kastaður út úr eygsjón tíni; tó vil eg líta aftur ímóti tínum heilaga templi.

5 Vøtnini umringaðu meg umkring, *enntá* til sálina: dýpdin lokaði meg runt umkring, tararnir vóru vavdir um mítt høvur.

6 Eg fór niður til fjallabotnanna; jørðin, við sínum lokum, *var* um meg um ævir: tó hevurt tú ført upp mítt lív frá rotnan, O HARRI Guð mín.

7 Tá ið sál mín ørmaktaðist innan í mær, mintist eg HARRAN: og mín bøn kom inn at tær, inn í títt heilaga tempul.

8 Teir, sum geva ans eftir lúgvandi fáfongdum, yvirgeva sína egnu miskunn.

9 Men eg vil sláturofra tær við røddini av takkarveitan; eg vil rinda *tað* sum eg havi heitt. Frelsa *er* av HARRANUM.

10 ¶ Og HARRIN talaði við fiskin, og hann spýði út Jónah uppá tað turra *landið*.

KAPITUL 3

OG HARRANS orð kom at Jónah aðru ferðina, sigandi,

2 Reis *teg*, far at Nín-ë-vëh, hasum mikla staði; og prædika at honum prædikanina sum eg bjóði tær.

3 So Jónah reistist, og fór at Nín-ë-vëh, samsvarandi við orð HARRANS. Nú, Nín-ë-vëh var ein avbera mikil staður á tríggja daga ferð.

4 Og Jónah byrjaði at innfara inn í staðin eina dagsferð, og hann geylaði, og segði, Enn fjøruti dagar, og Nín-ë-vëh skal verða kollrendur.

5 ¶ So Nín-ë-vëh fólk trúðu Guði, og lýstu eina føstu, og fóru í sekkjaklæði, frá hinum miklasta teirra enntá til hin minsta teirra.

6 Tí at orð kom at Nín-ë-vëh kongi, og hann reistist frá hásæti sínum, og hann legði sína skikkju frá sær, og dekkaði *seg* við sekkjaklæði, og sat í øskum.

7 Og hann elvdi *tí* at verða lýst og almannakunngjørt gjøgnum Nín-ë-vëh við^ einum løgboði hjá kongi og aðalsmonnum hansara, sigandi, Lat hvørki mann ella djór, stórfæafylgi ella smáfæafylgi, smakka nakað ting: lat tey ikki mata *sær*, ella drekka vatn:

8 Men lat mann og djór verða dekkað við sekkjaklæði, og geyla

mektigani at Guði: ja, lat teir venda hvør *og* ēin frá sínum illa vegi, og frá harðskapinum sum *er* í teirra hondum.

9 Hvør kann siga, *um* Guð vilji snúgvast og iðrast, og venda burt frá síni ógvusligu firtni, at vit farist ei?

10 ¶ Og Guð sá teirra verkˇ, at teir vendu frá sínum illa vegi; og Guð iðraðist um hitt illa, sum hann hevði sagt at hann vildi gera teimum; og hann gjørdi *tað* ikki.

KAPITUL 4

MEN tað mistoknaði Jónah ovurhondsliga, og hann varð sera firtin.

2 Og hann bað at HARRANUM, og segði, Eg biði teg, O HARRI, *var* ikki hetta framsøgn mín, tá ið eg var enn í landi mínum? Tí flýddi eg áður at Tarsjisj: tí at eg vitsti, at tú *ert* ein náðisamur Guð, og miskunnarfullur, seinur til firtnis, og av miklari blídni, og iðrar teg um hitt illa.

3 Tessvegna nú, O HARRI, tak, eg biði teg, lív mítt frá mær; tí at *tað er* betri hjá mær at doyggja enn at liva.

4 ¶ Tá segði HARRIN, Gert tú væl *í* at vera firtin?

5 So Jónah fór út úr staðinum, og sat á eystur síðuni av staðinum, og har gjørdi sær ein skála, og sat undir honum í skugganum, til hann mátti sjá hvat verða vildi úr staðinum.

6 Og HARRIN Guð fyrireikaði eitt grasker, og fekk *tað* at koma upp yvir Jónah, at tað mátti vera ein skuggi yvir hans høvur, at útfría hann frá hans harmi. So Jónah var avbera glaður um graskerið.

7 Men Guð fyrireikaði ein orm, tá ið morgunin reis hin næsta dagin, og hann sló graskerið, at tað følnaði.

8 Og tað bar á, tá ið sólin reistist, at Guð fyrireikaði ein ógvusligan eystanvind; og sólin bardi uppá høvur Jónah, at hann ørmaktaðist, og ynskti í sær sjálvum at doyggja, og segði, *Tað er* betri hjá mær at doyggja enn at liva.

9 Og Guð segði við Jónah, Gert tú væl *í* at vera firtin yvir graskerið? Og hann segði, Eg geri væl *í* at vera firtin, *enntá* at deyða.

10 Tá segði HARRIN, Tú hevurt havt várkunn á graskerið, fyri hvørt tú hevurt ikki strevast, eiheldur fekst tað *at* vaksa; sum kom upp í eini nátt, og gekk til grundar í eini nátt:

11 Og skuldi ikki eg spara Nīn´-ĕ-vēh, handa mikla stað, í hvørjum eru fleiri enn seksinstjúgu túsund persónar, sum duga ikki *at* greina ímillum sína høgru hond og sína vinstru hond; og *eisini* nógvur fenaður?

MICAH.

KAPITUL 1

ORÐ HARRANS, sum kom til Mī´-căh Mō-răs-thīt´-a á døgum Jó´-thăm-s, Áhazar, *og* Hĕzĕ-kī´-ăh, Judah konga, sum hann sá viðvíkjandi Să-mâr´-ī-ŭ og Jerusalem.

2 Hoyrið, øll tit fólk; lýð á, O jørð, og alt sum harí er: og lat Harran GUÐ vera vitni ímóti tykkum, Harran frá heilaga templi sínum.

3 Tí at sí, HARRIN kemur fram út úr plássi sínum, og vil koma oman, og treða uppá hini høgu pláss jarðarinnar.

4 Og fjøllini skulu verða brædd

undir honum, og dalarnir skulu verða klovnir, sum voks frammi fyri eldinum, *og* sum vøtnini *sum verða* helt niður eitt bratt pláss.

5 Fyri misbrot Jákobs *er* alt hetta, og fyri syndir Ísraels húss. Hvat *er* misbrot Jákobs? *er tað* ikki Să-mâr´-ĭ-â? og hvat *eru* hini høgu pláss Judah? *eru tey* ikki Jerusalem?

6 Tí vil eg gera Să-mâr´-ĭ-ŭ eins og ein dunga av akrinum, *og* sum plantingar av einum víngarði: og eg vil hella niður steinar tess inn í dalin, og eg vil avhylja grundvøllir tess.

7 Og allar hinar ristu myndir hjá tí skulu verða bardar í stykkir, og allar hýrurnar hjá tí skulu verða brendar við eldinum, og allar avgudarnar hjá tí vil eg leggja *í* oyði: tí hon savnaði *tað* av hýruni hjá eini skøkju, og tey skulu venda aftur til hýruna hjá eini skøkju.

8 Tí vil eg vena og ýla, eg vil ganga avklæddur og nakin: eg vil gera eina venan líka *sum* drekarnir, og harman sum uglurnar.

9 Tí hennara sár *er* ógrøðiligt; tí at tað er komið at Judah; hann er komin at portri fólks míns, *enntá* til Jerusalem.

10 ¶ Kunngerið tit *tað* ikki í Gáth, grátið tit ikki yvirhøvur: í húsi Aph´-rŭh rulla tær í støvinum.

11 Farið tit burtur, tú íbúgvi Sá´-phîr-s, havandi skomm tína nakna: íbúgvi Zā´-ă-năn-s kom ikki fram í harman Bĕth-ē´-zĕl-s; hann skal móttaka av tykkum sína støðu.

12 Tí at íbúgvi Mâr´-ōth-s bíðaði sútfullsligani eftir góðum: men ilt kom niður frá HARRANUM at portrinum av Jerusalem.

13 O tú íbúgvi Lá´-chĭsj, bint vagnin til hitt skjóta djórið: hon *er* byrjanin til syndina fyri Zions dóttur: tí at Ísraels misbrot vórðu funnin í tær.

14 Tí skalt tú geva gávur til Mō´-rĕsj-ĕth-gáth: hús Ach´-zīb-s *skulu verða* ein lygn fyri kongum Ísraels.

15 Tó vil eg føra ein arvinga at tær, O íbúgvi av Mă-rē´-sjâh: hann skal koma til Adullam — dýrd Ísraels.

16 Ger teg skallutan, og stubba tær fyri tíni fínlátigu børn; vaks um tín skallutleika sum ørnin; tí at tey eru farin inn í fangaskap frá tær.

KAPITUL 2

VEI til teirra sum upphugsa misgerð, og virka ilt uppiá sínum songum! tá ið morgunin er ljósur, íðka teir tað, av tí at tað er í máttinum hjá teirra hond.

2 Og teir girnast akrar, og taka *teir* við harðskapi; og hús, og taka *tey* burtur: soleiðis kúga teir ein mann og hús hansara, enntá ein mann og arvalut hansara.

3 Tessvegna, svá sigur HARRIN; Sí, ímóti hesi familju upphugsi eg eitt ilt, frá hvørjum tit skulu ikki firra tykkara hálsar; eiheldur skulu tit fara hástórnisligani: tí henda tíðin *er* ill.

4 ¶ Í tí degi skal *ēin* taka upp eina dømisøgu ímóti tykkum, og harma við einum grøtiligum harmljóði, *og* siga, Vit veri aldeilis herjaðir: hann hevur broytt skamtin hjá fólki mínum: hvør hevur hann firrað *hann* frá mær! snúgvandi burt hevur hann skift *sundur* akrar várar.

5 Tí skalt tú hava ongan, sum skal kasta eitt band viðˆ luti í samkomu HARRANS.

6 Propheterið tit ikki, *siga teir til teirra sum* prophetera: teir skulu ikki prophetera fyri teimum, *at* teir skulu ei fáa skomm.

7 ¶ O *tú sum ert* nevndur Jákobs hús, er HARRANS andi trengdur? *eru* hetta hansara gerningar? gera ikki orðini hjá mær

gott við hann sum gongur reiðiliga?

8 Enntá fyri stuttum er fólk mítt risið upp sum ein figgindi: tit hála av skikkjuna við klæðinum frá teimum ið fara framvið tryggliga, sum menn forða *sær* frá kríggi.

9 Kvinnurnar av mínum fólki hava tit kastað út frá yndisligu húsum teirra; frá teirra børnum hava tit tikið burt mína dýrd um ævir.

10 Reisist tit, og farið avstað; tí at hetta *er* ikki *tykkara* hvíla: av tí at tað er óreinkað, skal tað oyða *tykkum,* enntá við eini svárari oyðing.

11 Um ein maður, gangandi í andanum og falssemi ljúgvi, *sigandi,* Eg vil prophetera tær um vín og um sterkan drykk; hann skal enntá vera propheturin hjá hesum fólki.

12 ¶ Eg vil vissuliga fylkja, O Jákob, allar av tær; eg vil vissuliga savna leivd Ísraels; eg vil koyra teir saman sum seyðin hjá Bǒźrăh, sum fylgið í miðjuni av sínum byrgi: teir skulu gera mikið ljóð uppá grund av *fjøldini av* monnum.

13 Brótarin er komin upp frammanfyri teimum: teir hava brotið út, og eru farnir ígjøgnum portrið, og eru farnir út hjá tí: og teirra kongur skal fara undan teimum, og HARRIN á odda hjá teimum.

KAPITUL 3

OG eg segði, Hoyrið, eg biði tykkum, O høvuðs*menn* hjá Jákobi, og tit prinsar av Ísraels húsi; *Er tað* ikki fyri tykkum at kenna dóm?

2 Sum^{p} hata tað góða, og elska hitt illa; sum^{p} slíta av teirra húð uttan av teimum, og teirra kjøt uttan av teirra beinum;

3 Sum^{p} eisini eta kjøt fólks míns, og fletta teirra húð uttan av teimum; og teir bróta teirra bein˘, og hakka tey í stykkir, sum til pottin, og sum kjøt inni í stórketlinum.

4 Tá skulu teir rópa á HARRAN, men hann vil ikki hoyra teir: hann vil enntá fjala sítt andlit frá teimum á teirri tíð, eins og teir hava háttað sær illa í gerningum sínum.

5 ¶ Svá sigur HARRIN viðvíkjandi prophetunum sum fáa fólk mítt *at* fara skeivt, sum bíta við sínum tonnum, og rópa, Friður; og hann sum koyrir ikki inn í teirra munnar, teir enntá fyrireika kríggj ímóti honum.

6 Tí *skal* nátt *verða* at tykkum, at tit skulu ikki hava eina sjón; og tað skal verða myrkt at tykkum, at tit skulu ikki spásiga; og sólin skal fara niður yvir prophetarnar, og dagurin skal verða myrkur yvir teimum.

7 Tá skulu síggjararnir skammast, og spásagnarmenninir fjamskast: ja, teir skulu allir hylja sínar varrar; tí at *har er* einkið svar av Guði.

8 ¶ Men sanniliga, eg eri fullur av kraft við˘ anda HARRANS, og av dómi, og av mátti, at kunngera Jákobi hansara misbrot, og fyri Ísrael hansara synd.

9 Hoyrið hetta, eg biði tykkum, tit høvuðs*menn* av Jákobs húsi, og prinsar av Ísraels húsi, sum hava andstygd fyri dómi, og spilla alla rættferð.

10 Teir byggja upp Zion við blóði, og Jerusalem við misgerð.

11 Høvuðs*menn*inir hjá tí døma fyri endurgjald, og prestarnir hjá tí frálæra fyri hýru, og prophetarnir hjá tí spáa fyri pening: tó vilja teir halla *sær* uppá HARRAN, og siga, *Er* ikki HARRIN okkara millum? einkið ilt kann koma uppá okkum.

12 Tí skal Zion fyri tykkara

skyld verða pløgd *sum* ein akur, og Jerusalem skal gerast rúgvur, og fjall hússins sum hini høgu stød skógarins.

KAPITUL 4

MEN í hinum síðstu døgum skal tað bera á, *at* fjallið av HARRANS húsi skal vera grundfest á fjallatoppinum, og tað skal vera upphevjað uppum heyggjarnar; og fólk skal streyma at tí.

2 Og mangar tjóðir skulu koma, og siga, Komið, og latum okkum fara niðan til fjalls HARRANS, og til húss Guðs Jákobs; og hann vil frálæra okkum um vegir sínar, og vit vilja ganga í rásum hansara: tí at lógin skal ganga fram úr Zion, og HARRANS orð frá Jerusalem.

3 ¶ Og hann skal døma millum mangra tjóða, og harta sterkar tjóðir langt burturifrá; og teir skulu berja síni svørð yvirí plógjørn, og síni spjót yvirí snidriblød: tjóð skal ikki lyfta upp svørði ímóti tjóð, eiheldur skulu teir læra kríggj meira.

4 Men teir skulu sita hvør maður undir víntræi sínum og undir fikutræi sínum; og eingin skal gera *teir* ræddar: tí at muður HARRA herliðanna hevur talað *tað*.

5 Tí at øll fólk vilja ganga hvør *og* ēin í navni guds síns, og vit vilja ganga í navni HARRANS Guðs várs um ævir og ævir.

6 Í tí degi, sigur HARRIN, vil eg fylkja hana sum haltar, og eg vil savna hana sum er rikin út, og hana sum eg havi nívt;

7 Og eg vil gera hana sum haltaði *til* eina leivd, og hana sum var kastað langt burtur *til* eina sterka tjóð: og HARRIN skal ríkja yvir teimum á Zion fjalli hiðanífrá, enntá um ævir.

8 ¶ Og tú, O torn fylgisins, vígvirki Zions dóttur, at tær skal tað koma, enntá hitt fyrsta harradømi; kongadømið skal koma til dóttur Jerusalems.

9 Nú, hví rópart tú hart út? *finst* eingin kongur í tær? er tín ráðgevi týndur? tí at verkir hava tikið teg sum eina kvinnu í føðingarverkjum.

10 Ver í pínu, og strevast at bera fram, O Zions dóttir, sum ein kvinna í føðingarverkjum: tí at nú skalt tú fara fram út úr staðinum, og tú skalt búgva í akrinum, og tú skalt fara *enntá* til Bábylon; har skalt tú verða útfríað; har skal HARRIN endurloysa teg frá hondini á figgindum tínum.

11 ¶ Nú eisini eru mangar tjóðir savnaðar ímóti tær, sum siga, Lat hana verða óreinkaða, og lat okkar eyga hyggja uppá Zion.

12 Men teir skyna ikki hugsanir HARRANS, eiheldur skilja teir ráð hans: tí at hann skal savna teir sum bundini inn á gólvið.

13 Reis *teg* og tresk, O Zions dóttir: tí at eg vil gera horn títt *til* jarn, og eg vil gera tínar hógvar *til* messing: og tú skalt berja í stykkir mong fólk: og eg vil innvíga teirra ávinning HARRANUM, og teirra *figgjar*evni at Harra heilu jarðarinnar.

KAPITUL 5

NÚ, savna teg í fylkingum, O dóttir at fylkingum: hann hevur lagt kringseting ímóti okkum: teir skulu sláa dómara Ísraels við einum stavi uppá kjálkan.

2 Men tú, Beth-lehem Êph'-rătăh, *tó at* tú veri *teg* lítil millum túsundir Judah, *tó* út úr tær skal hann koma fram yvirfyri mær, *sum eigur* at vera stjórnari í Ísrael; hvørs faringar fram *hava verið* frá úr forðum, frá ævigtvarandi.

3 Tí vil hann geva teir upp,

inntil ta tíð *ið* hon, sum hevur verkir, hevur borið fram: tá skal leivdin av brøðrum hansara venda aftur at børnum Ísraels.

4 ¶ Og hann skal standa og mata í styrki HARRANS, í hátignini av navni HARRANS Guðs síns; og teir skulu verða *verandi:* tí at nú skal hann vera mikil at endum jarðarinnar.

5 Og hesin *maðurin* skal vera friðurin, tá ið Assýriarin skal koma inn í land okkara: og tá ið hann skal traðka í slottum okkara, tá skulu vit reisa ímóti honum sjey hirðar, og átta aðal menn.

6 Og teir skulu oyða Assýriu land við svørðinum, og Nimrods land í innfaringum tess: svá skal hann bjarga *okkum* frá Assýriaranum, tá ið hann kemur inn í okkara land, og tá ið hann traðkar innum okkara landamørk.

7 Og Jákobs leivd skal vera í miðjuni av mongum fólki sum ein døgg frá HARRANUM, sum skúrir uppiá grasinum, sum dvølur ikki eftir manni, ella bíðar eftir sonum manna.

8 ¶ Og Jákobs leivd skal vera Heidninganna millum í miðjuni av mongum fólki sum ein leyva millum skógardjóranna, sum ein ung leyva millum seyðafylgjanna: hvør, um hann fari ígjøgn, bæði treður niður, og skræðir í stykkir, og eingin kann bjarga.

9 Tín hond skal verða lyft upp uppá tínar mótstandarar, og allir tínir figgindar skulu verða skornir av.

10 Og tað skal bera á í tí degi, sigur HARRIN, at eg vil skera av tínar hestar burtur úr miðjum tær, og eg vil oyðileggja hervagnar tínar:

11 Og eg vil skera av staðir lands tíns, og kasta niður øll tíni vígvirkir:

12 Og eg vil skera av heksakunstir út úr hond tíni; og tú skalt hava ei *meira* spásagnarmenn:

13 Tínar ristu myndir eisini vil eg skera av, og tínar standandi myndir út úr miðjum tær; og tú skalt ei meira tilbiðja verk˘ handa tína.

14 Og eg vil slíta upp tínar lundir út úr miðjum tær: soleiðis vil eg oyða tínar staðir.

15 Og eg vil útinna hevnd í firtni og øði uppá hinar heidnu, slíkt sum teir ei hava hoyrt.

KAPITUL 6

HOYRIÐ tit nú hvat HARRIN sigur; Reis *teg,* træta tú frammanfyri fjøllunum, og lat heyggjarnar hoyra tína rødd.

2 Hoyrið tit, O fjøll, HARRANS deilumál, og tit sterku grundvøllir jarðarinnar: tí at HARRIN hevur eitt deilumál við fólk sítt, og hann vil føra søk við Ísrael.

3 O fólk mítt, hvat havi eg gjørt tær? og í hvørjum havi eg møtt teg? vitna ímóti mær.

4 Tí at eg førdi teg upp út úr Egyptalandi, og endurloysti teg út úr húsinum hjá tænarum; og eg sendi undan tær Móses, Aaron, og Mirjam.

5 O fólk mítt, minst til nú hvat Bálak kongur av Móab ráðlegði, og hvat Bá´-laām Bē´-ōr-s sonur svaraði honum frá Sjīt´-tīm til Gīl´-gāl; at tit mega kenna rættvísi HARRANS.

6 ¶ Við hvørjum skal eg koma framfyri HARRAN, *og* boyggja meg frammi fyri hinum høga Guði? skal eg koma framfyri hann við brenniofrum, við kálvum eitt ára gomlum?

7 Vil HARRIN verða *góð*toknaður við túsundir av veðrum, *ella* við tíggju túsundir av løkjum av olju? skal eg geva mín frumborna *fyri* misbrot mítt, ávøkstin av mínum likami *fyri* syndina hjá míni sál?

8 Hann hevur sýnt tær, O maður, hvat *er* gott; og hvat krevur HARRIN av tær, uttan at gera rættlátligani, og at elska miskunn, og at ganga eyðmjúkiligani við tínum Guði?

9 HARRANS rødd rópar á staðin, og vísdóms *maðurin* skal síggja títt navn: hoyrið tit stavin, og hvør útnevnt hann hevur.

10 ¶ Eru enn vondskunnar dýrgripir í húsi hins vonda, og hitt laka mát *sum* andstyggiligt *er?*

11 Skal eg rokna *teir* skírar við hinum vondu vágskálum, og við taskuni av svikaligum vektum?

12 Tí at teir ríku menninir hjá tí eru fullir í harðskapi, og tess íbúgvar hava talað lygnir, og teirra tunga *er* svikafull í teirra munni.

13 Tí eisini vil eg gera *teg* sjúkan í at sláa teg, í at gera *teg* oydnan vegna syndir tínar.

14 Tú skalt eta, men ikki verða mettaður; og tín niðurtynging *skal vera* í miðjum tær; og tú skalt taka hald, men skalt ikki útfría; og *tað,* sum tú útfríart, vil eg geva upp til svørðið.

15 Tú skalt sáa, men tú skalt ikki heysta; tú skalt traðka olivinberini, men tú skalt ikki salva teg við olju; og søtt vín, men skalt ikki drekka vín.

16 ¶ Tí at ásetingar Omrīs verða hildnar, og øll verkini hjá Áhabs húsi, og tit ganga í ráðum teirra; at eg skuldi gera teg *til* eina oyðing, og tess íbúgvar *til* eina fising: tí skulu tit bera skemd fólks míns.

KAPITUL 7

EYA meg! tí at eg eri sum tá ið teir hava savnað summar fruktirnar, eins og víngarðsins víndrúvu fínhentingar: *har er* einkið tyssi at eta: mín sál tráaði ta frumstadnu fruktina.

2 Hin góði *maður* er týndur úr jørðini: og *tað er* eingin reiðiligur millum manna: teir allir liggja á lúri eftir blóði; teir veiða hvør maður bróður sín við einum neti.

3 ¶ At teir mega gera ilt við báðum hondum ivrigani, prinsurin spyr, og dómarin *biður* um eitt endurgjald; og hin mikli *maður,* hann mælir sína meinasomu tráan: soleiðis teir pakka tað saman.

4 Hin besti av teimum *er* sum ein tistil: hin mest reiðiligi *er hvassari* enn ein tornagirðing: dagurin av tínum varðmonnum *og* tíni heimsøking kemur; nú skal teirra ørkymlan verða.

5 ¶ Troystið tit ikki á ein vin, setið tit ikki álit á ein vegleiðara: halt hurðarnar á tínum munni frá henni sum liggur í barmi tínum.

6 Tí at sonurin vanærir faðirin, dóttirin rísur upp ímóti móður síni, verdóttirin ímóti vermóður síni; figgindarnir hjá einum manni *eru* menninir av egna húsi hansara.

7 Tí vil eg líta at HARRANUM; eg vil bíða eftir Guði frelsu mínar: mín Guð vil hoyra meg.

8 ¶ Fegnast ikki ímóti mær, O figgindi mín: tá ið eg falli, eg skal reisast; tá ið eg siti í myrkri, HARRIN *skal vera* mær eitt ljós.

9 Eg vil bera HARRANS harmavreiði, av tí at eg havi syndað ímóti honum, inntil hann flyti mítt mál, og útinni dóm fyri meg: hann vil føra meg fram til ljósið, *og* eg skal skoða hans rættvísi.

10 Tá skal *hon, sum er* figgindi mín, síggja *tað;* og skomm skal hylja hana sum segði við meg, Hvar er HARRIN Guð tín? míni eygu skulu eygleiða hana: nú skal hon verða traðkað niður sum gatnanna evja.

11 *Í* tí degi sum tínir múrar eiga at verða bygdir, *í* tí degi skal løgskipanin verða fjart firrað.

12 *Í* tí degi *eisini* skal hann koma enntá til tín frá Assýriu, og *frá* hinum víggirdu staðum, og frá festninginum enntá til ánna, og frá sjógvi til sjóvar, og *frá* fjalli til fjalls.

13 Hóast hetta, landið skal vera oyði orsakað av teimum sum búgva harí, fyri ávøkstin av teirra gerðum.

14 ¶ Mata títt fólk við stavi tínum, fylgi arvaluts tíns, sum búgva einsærisligani *í* skóginum, á miðjum Carmel: lat teir mata *sær í* Bá'-sjān og Gilead, sum í døgunum í forðum.

15 Samsvarandi við dagarnar av tíni koming út úr Egyptalandi vil eg sýna honum undrunarverd *ting*.

16 ¶ Tjóðirnar skulu síggja og verða fjamskaðar um allan teirra mátt: teir skulu leggja *sína* hond uppá *sín* munn, teirra oyru skulu verða deyv.

17 Teir skulu sleikja støvið sum ein høggormur, teir skulu flyta úr sínum holum sum ormar jarðarinnar: teir skulu verða ræddir fyri HARRANUM Guði várum, og skulu óttast orsakað av tær.

18 Hvør *er* ein Guð líkur tær, sum náðar misgerð, og fer framvið misbrotinum hjá leivd arvaluts síns? hann afturheldur ikki sína firtni um ævir, av tí at hann fragdast *í* miskunn.

19 Hann vil venda aftur, hann vil hava várkunn yvir okkum; hann vil undirleggja okkara misgerðir; og tú vilt kasta allar teirra syndir inn í havsins dýpdir.

20 Tú vilt útinna sannleikan fyri Jákobi, *og* miskunnina fyri Ábrahami, sum tú hevurt svorið okkara fedrum frá døgunum í forðum.

NÁHUM.

KAPITUL 1

BYRÐI Nīn'-ĕ-vēh. Bók sjónar Náhum-s Ĕl-kô-sjīt'-a.

2 Guð *er* ástbrellin, og HARRIN hevnir; HARRIN hevnir, og *er* í øðini; HARRIN vil taka hevnd á sínar mótstandarar, og leggur niðurfyri *vreiði* til sínar figgindar.

3 HARRIN *er* seinur til firtnis, og mikil í mátti, og vil ikki yvirhøvur fríkenna *hin vonda:* HARRIN *hevur* veg sín í meldurvindinum og í storminum, og skýggini *eru* dustið av hansara fótum.

4 Hann hartar sjógvin, og ger hann turran, og turkar upp allar áirnar: Bá'-sjān fánar, og Carmel, og Lī'-bă-nŏn-s blóma fánar.

5 Fjøllini skelva fyri honum, og heyggjarnir smelta, og jørðin verður brend fyri hansara nærveru, ja, verøldin, og allir sum búgva harí.

6 Hvør kann standast frammi fyri harmavreiði hansara? hvør kann verða *verandi* í grimdini av hansara firtni? hans øði verður helt út sum eldur, og klettarnir verða kastaðir niður av honum.

7 HARRIN *er* góður, eitt hervirki á degi trongdarinnar; og hann kennir teir sum troysta á hann.

8 Men við eini yvirrennandi flóð vil hann gera ein fullkomnan enda á plássi tess, og myrkur skal elta hansara figgindar.

9 Hvat ímynda tit ímóti HARRANUM? hann vil gera ein fullkomnan enda: kvøljan skal ikki rísa upp aðru ferðina.

10 Tí at meðan *teir veri* tvinnaðir saman *sum* tornir, og meðan teir eru druknir *sum* drykkju-

menn, skulu teir verða upptærdir sum hálmur fult turrur.

11 Tað er *ēin* komin út úr tær, sum ímyndar ilt ímóti HARRANUM, ein vondur ráðgevi.

12 Svá sigur HARRIN; Tó *at teir veri seg* kvirrir, og líkaleiðis mangir, tó svá skulu teir verða skornir niður, tá ið hann skal fara ígjøgn. Tó *at* eg havi teg nívt, eg vil teg níva ei meira.

13 Tí at nú vil eg bróta hans ok uttan av tær, og vil bresta tíni bond sundur.

14 Og HARRIN hevur givið eina skipan viðvíkjandi tær, *at* ei meira av tínum navni verði sáð að: burtur úr húsi guda tína vil eg skera av hina ristu mynd og hina bræddu mynd: eg vil reiða tína grøv; tí at tú ert ønskriligur.

15 Síggj uppiá fjøllunum føturnar hjá honum sum ber góð tíðindir, sum kunnger frið! O Judah, halt tínar hátíðar-veitslur, útinn tíni heitstreingir: tí at hin vondi skal ei meira fara ígjøgnum teg; hann er fullkomiliga skorin av.

KAPITUL 2

HANN, sum smekkar í stykkir, er komin upp framfyri títt andlit: varðveit krígsútgerðina, varða vegin, ger lendar *tínar* sterkar, víggirð *tín* mátt mektigani.

2 Tí at HARRIN hevur vent burtur Jákobs avbærni, sum Ísraels avbærni: tí at tømararnir hava tømt teir út, og skatt teirra vínviðargreinar.

3 Skjøldur hansara mektigu manna er gjørdur reyður, hinir reystu menn *eru* í skarlaki: hervagnarnir *skulu vera* við logandi faklum á deginum av hansara fyrireiking, og aðalgranntrøini verða ræðuligani rist.

4 Hervagnarnir skulu leika í í gøtunum, teir skulu skotra hvør ímóti øðrum á teimum breiðu vegunum: teir skulu tykjast eins og faklar, teir skulu renna sum snarljósini.

5 Hann skal ramsa upp sínar virðismiklu: teir skulu snáva í síni gongd; teir skulu skunda *sær* til múrin hjá tí, og verjan skal verða fyribúgvin.

6 Áanna portur skulu verða opnað, og slottið skal verða upployst.

7 Og Hūz′-zāb skal verða leidd burt *til* fanga, hon skal verða førd upp, og hennara moyggjar skulu leiða *hana* sum við røddini á dúgvum, trummandi uppá síni bróst.

8 Men Nīn′-ĕ-vēh *er* úr forðum sum ein hylur av vatni: tó skulu teir flýggja burt. Standið, standið, *skulu teir geyla;* men eingin skal líta tilbakar.

9 Takið tit fongin av silvuri, takið fongin av gulli: tí at *tað er* eingin endi á goymsluni *og* dýrd*ini* úr øllum tí dámliga innbúgvinum.

10 Hon er tóm, og leys, og oyðin: og hjartað bráðnar, og knøini sláa tilsaman, og nógv pína *er* í øllum lendum, og andlitini á teim øllum savna svartleika.

11 Hvar *er* bústaðurin hjá leyvunum, og matingarstaðið hjá hinum ungu leyvunum, har leyvan, *enntá* hin gamla leyvan, gekk, *og* leyvuhvølpurin, og eingin gjørdi *tey* rædd?

12 Leyvan skræddi í stykkir nóg mikið til hvølpar sínar, og kvaldi til leyvinnur sínar, og fylti sínar holur við bráði, og síni hellir við ráni.

13 Sí, eg *eri* ímóti tær, sigur HARRI herliðanna, og eg vil brenna hennara hervagnar í roykinum, og svørðið skal gloypa tínar ungu leyvur: og eg vil skera av tína bráð oman av jørðini, og røddin á tínum sendiboðum skal ei meira verða hoyrd.

KAPITUL 3

VEI til hins blóðiga staðar! hann *er* allur fullur av lygnum

og ráni; ránsfæið fer ikki burtur;
2 Ljóðið av einum koyrli, og ljóðið av skramblingini av hjólunum, og av teimum tvísporandi hestunum, og av teimum støkkandi hervagnunum.
3 Hestmaðurin lyftir upp bæði tað bjarta svørðið og hitt glitrandi spjótið: og *har er* ein fjøld av vignum, og eitt stórt tal av ræum; og *tað er* eingin endi á *teirra* líkum; teir snáva uppiá sínum líkum:
4 Uppá grund av fjøldini av hordómum hinnar vældæmdu skøkju, heksakunstna-frúnni, sum selur tjóðir gjøgnum hordómar sínar, og familjur gjøgnum heksakunstir sínar.
5 Sí, eg *eri* ímóti tær, sigur HARRI herliðanna; og eg vil avhylja tíni skjúrt uppá títt andlit, og eg vil sýna tjóðunum tína nakni, og kongadømunum tína skomm.
6 Og eg vil kasta andstyggiligan skitt uppá teg, og gera teg syndarliga, og vil seta teg sum eina skurssjón.
7 Og tað skal bera á, *at* allir teir sum hyggja uppá teg, skulu flýggja frá tær, og siga, Nīn´-ĕvēh er løgd *í* oyði: hvør vil harma hana? hvaðani skal eg søkja uggarar til tín?
8 Ert tú betri enn fólkaríka Nō, sum var staðsett áanna millum, *sum hevði* vøtnini rundan um seg, hvørs virkisgarður *var* havið, *og* hennara múrur *var* frá havinum?
9 È-thĭ-ō´-pĭ-ă og Egyptaland *vóru* hennara styrki, og *tað var* endaleyst; Pŭt og Lū´-bĭm vóru tínir hjálparar.
10 Tó *varð* hon borin burtur, hon fór inn í fangaskap: hennara ungu børn eisini vórðu smekkaði í stykkir við mótið á øllum gøtunum: og teir kastaðu lutir um hennara heiðursomu menn, og allir hennara miklu menn vórðu bundnir í leinkjur.
11 Tú eisini skalt verða drukkin: tú skalt verða fjald, tú eisini skalt søkja *tær* styrki uppá grund av figgindanum.
12 Øll tíni hervirkir *skulu vera sum* fikutrø við hinum frumstadnu fikum: um tey verði rist, skulu tey enntá falla inn í munnin hjá etaranum.
13 Sí, fólk títt í miðjum tær *eru* kvinnur: portrini av tínum landi skulu verða sett víðopin at tínum figgindum: eldurin skal upptæra tínar lokur.
14 Drag tær vøtn til kringsetingina, víggirð tíni hervirkir: far inn í leir, og traðka mørtilin, ger sterkan tigulsteins-ovnin.
15 Har skal eldurin upptæra teg; svørðið skal skera teg av, tað skal eta teg upp sum aldinboran: ger teg mangar sum aldinboran, ger teg mangar sum ongspretturnar.
16 Tú hevurt margfaldað tínar handilsmenn uppum stjørnur himins: aldinboran herjar, og flýggjar avstað.
17 Tínir krýndu *eru* sum ongspretturnar, og tínir høvuðsmenn sum hinar miklu grashoppur, sum leirast í byrgjunum á tí kalda deginum, *men* tá ið sólin reisist, flýggja teir burt, og teirra pláss er ikki kent har teir *eru*.
18 Tínir hirðar durva, O Assýriu kongur: tínir tignarmenn skulu búgva *í støvinum:* títt fólk er spjatt uppiá fjøllunum, og eingin maður savnar *teir*.
19 *Tað finst* eingin grøðing av løsti tínum; sár títt er herviligt: allir, sum hoyra fregnina um teg, skulu klappa hendurnar yvir teg: tí uppá hvønn hevur ikki tín vondska farið støðugt?

HÁBAKKUK.

KAPITUL 1

BYRÐIN, sum Há-băk´-kŭk prophetur sá.

2 O HARRI, hvør leingi skal eg geyla, og tú vilt ikki hoyra! *enntá* geyla út at tær *um* harðskap, og tú vilt ikki frelsa!

3 Hví sýnirt tú mær misgerð, og veldurt *mær* at skoða herviligsemi? tí at herjan og harðskapur *eru* frammi fyri mær: og til eru, *sum* reisa upp stríð og trætnað.

4 Tí er lógin slakkað, og dómur gongur ongantíð fram: tí hin vondi umringar hin rættvísa umkring; tí útgongur rangur dómur.

5 ¶ Skoðið tit hinna heidnu millum, og gevið ans, og undrist undrunarsamligani: tí at *eg* vil virka eitt verk í tykkara døgum, *sum* tit vilja ikki trúgva, tó *at* tað verði sagt *tykkum*.

6 Tí at sí, eg reisi upp Chăl-dē´-ararnar, *hasa* beisku og skundigu tjóð, sum skal herganga ígjøgnum breiddina av landinum, at ognast bústaðirnar *sum eru* ikki teirra.

7 Teir *eru* ræðuligir og øtiligir: teirra dómur og teirra tign skal útganga frá teimum sjálvum.

8 Teirra hestar eisini eru skjótari enn leopardarnir, og eru meiri ógvusligir enn kvøld úlvarnir: og teirra hestmenn skulu spreiða seg, og teirra hestmenn skulu koma fjar*vegis* frá; teir skulu flúgva sum ørnin, *sum* skundar at eta.

9 Teir skulu koma allir vegna harðskap: teirra andlit skulu súpa upp *sum* eystanvindurin, og teir skulu savna fangaskapin sum sandin.

10 Og teir skulu háða eftir kongunum, og prinsarnir skulu vera eitt spott yvirfyri teimum: teir skulu gera gjøldur úr hvørjum hervirki; tí at teir skulu hópa støv, og taka tað.

11 Tá skal *hans* hugur skifta, og hann skal fara yvir, og forbróta, *tilroknandi* henda sín mátt at gudi sínum.

12 ¶ *Ert* tú ikki frá ævigtvarandi, O HARRI Guð mín, Hin Heilagi mín? vit skulu ikki doyggja. O HARRI, tú hevurt fyriskipað teir til dóms; og, O mektigi Guð, tú hevurt grundlagt teir til rættleiðing.

13 *Tú ert* av skírari eygum enn at hyggja at illum, og kanst ikki líta at misgerð: hvørsvegna hyggurt tú uppá teir sum handla svikrædisliga, *og* heldurt tungu tíni tá ið hin vondi gloypur *tann mann sum er* meiri rættvísur enn hann?

14 Og gert menn sum fiskar havsins, eins og skriðkyktini *sum hava* ongan stjórnara yvir sær?

15 Teir taka upp allar av teimum við onglinum, teir fanga teir í síni nót, og savna teir í sítt garn: harfyri teir fegnast og eru glaðir.

16 Harfyri sláturofra teir at síni nót, og brenna roykilsi at sínum garni; av tí at við teimum teirra deilur *er* feitur, og teirra matur ríkiligsamur.

17 Skulu teir tí tøma sína nót, og ikki spara støðugt at bana tjóðunum?

KAPITUL 2

EG vil standa uppiá míni vakt, og stilla meg uppá tornið, og vil vakta *fyri* at sjá hvat hann vil siga við meg, og hvat eg skal svara tá ið eg verði átalaður.

2 Og HARRIN svaraði mær, og segði, Skriva sjónina, og ger *hana* týðiliga uppá talvur, at hann má renna sum lesur hana.

3 Tí at sjónin *er* enn til eina ásetta tíð, men við endan skal hon tala, og ikki lúgva: tó *at* hon dráli, bíða eftir henni; av tí at tað vil vissuliga koma, tað vil ikki drála.

4 Sí, sál hansara, *sum* er lyftur upp, er ikki rættilig í honum: men hin rættvísi skal liva við trúgv síni.

5 ¶ Ja eisini, av tí at hann misbrýtur við víni, *er hann* ein hugmóðigur maður, eiheldur heldist við hús, sum størrar um sína trá sum helviti, og *er* sum deyði, og kann ikki verða nøktaður, men savnar at sær allar tjóðir, og hópar at sær øll fólk:

6 Skulu ikki allir hesir taka upp eina dømisøgu ímóti honum, og eitt háðandi orðtak ímóti honum, og siga, Vei til hansara sum økir um *tað sum er* ikki hansara! hvussu leingi? og til hansara sum løðir seg sjálvan við tjúkkum leiri!

7 Skulu teir ikki rísa upp bráðliga sum skulu bíta teg, og vakna sum skulu níva teg, og tú skalt vera teimum til býtir?

8 Av tí at tú hevurt herjað mangar tjóðir, skal øll leivdin av fólkinum herja teg; uppá grund av blóði manna, og *fyri* harðskap landsins, staðarins, og hjá øllum sum búgva harí.

9 ¶ Vei til hansara sum girnast eina illa ágirndarsemi til húss síns, at hann má seta sítt reiður til hæddar, at hann má verða útfríaður frá máttinum hjá illum!

10 Tú hevurt ráðlagt skomm til tíns húss við at skera av mong fólk, og hevurt syndað *ímóti* sál tíni.

11 Tí at steinurin skal geyla út úr múrinum, og bummurin út úr timbrinum skal svara honum.

12 ¶ Vei til hansara sum byggir ein bý við blóði, og grundleggur ein stað við misgerð!

13 Sí, *er tað* ikki av HARRA herliðanna, at fólkið skal strevast í sjálvasta eldinum, og fólkið skal møða seg fyri sjálva fáfongd?

14 Tí at jørðin skal verða fylt við kunnleikanum til dýrd HARRANS, eins og vøtnini hylja havið.

15 ¶ Vei honum sum gevur næsta sínum drykk, sum seturt tína fløsku til *hansara,* og gert *hann* druknan eisini, at tú mást hyggja á teirra nakni!

16 Tú ert fyltur við skomm fyri dýrd: drekk tú eisini, og lat tína forhúð verða avhulda: bikarið av HARRANS høgru hond skal verða vent at tær, og skammilig spýggja *skal vera* á tíni dýrd.

17 Tí at Lī´-bă-nŏn-s harðskapur skal dekka teg, og fongurin av djórum, *sum* gjørdu teir ræddar, uppá grund av blóði manna, og fyri harðskap landsins, staðarins, og hjá øllum sum búgva harí.

18 ¶ Hvat gagnar hin rista mynd, at gerarin harav hevur rist hana; hin brædda mynd, og ein frálærari av lygnum, at gerarin av sínum verki troystar hará, at gera málleysar skurðgudar?

19 Vei honum sum sigur til viðin, Vakna; til hin málleysa stein, Reis *teg,* hann skal frálæra! Sí, hann *er* lagdur yvir við gulli og silvuri, og *tað er* eingin andadráttur yvirhøvur í miðjum honum.

20 Men HARRIN *er* í heilaga templi sínum: øll jørðin haldi tøgn fyri honum.

KAPITUL 3

EIN bøn av Há-băk´-kŭk propheti uppá Sjĭg-ī-ō´-nŏth.

2 O HARRI, eg havi hoyrt tína talu, *og* varð ræddur: O HARRI, endurlívga títt verk í miðjum árunum, í miðjum árunum ger kunnugt; í vreiði minst til miskunn.

3 Guð kom frá Tē´-măn, og Hin Heilagi frá Pár´-ăn fjalli. Sē´-lâh. Hans dýrd huldi himnarnar, og jørðin var full av hansara lovi.

4 Og *hans* bjartleiki var sum ljósið; hann hevði horn *komandi* út úr hond síni: og har *var* goymi*staðið* hjá hansara mátti.

5 Undan honum gekk drepsótt-

in, og brennandi kol gingu út við hansara føtur.

6 Hann stóð, og mátaði jørðina: hann skoðaði, og rak sundur tjóðirnar; og hini ævigtvarandi fjøll vórðu spjødd, hinir viðvarandi heyggjar boygdust: hansara vegir *eru* ævigtvarandi.

7 Eg sá Cū´-sjăn-s tjøld í kvøljan: *og* tjalddúkar Mī´-dī-ăn-s skulvu.

8 Var HARRIN misnøgdur inná áirnar? *var* tín firtni ímóti áunum? *var* tín vreiði ímóti sjónum, at tú reiðst uppiá tínum hestum *og* tínum frelsu vagnum?

9 Tín bogi varð gjørdur heilt nakin, *samsvarandi* við eiðir ættargreinanna, *enntá títt* orð. Sē´-lâh. Tú kleyvst jørðina við áum.

10 Fjøllini sóu teg, *og* tey nøtraðu: yvirfloyming vatnsins fór framvið: djúpið mælti rødd síni, *og* lyfti upp sínar hendur til hæddar.

11 Sólin *og* mánin stóðu still í sínum býli: fyri ljósinum av tínum ørvum tey fóru, *og* fyri skininum av tínum glitrandi spjóti.

12 Tú skrúðgekst gjøgnum landið í harmavreiði, tú tresktirt hinar heidnu í firtni.

13 Tú gekst út fyri frelsu fólks tíns, *enntá* fyri frelsu við salvaða tínum; tú særdirt høvdið úr húsi hins vonda, við at avhylja grundvøllin at hálsinum. Sē´-lâh.

14 Tú lamdirt ígjøgn við hansara stavum høvuðs*mann*in av hansara bygdum: teir komu út sum ein meldurvindur at spjaða meg: teirra fagnan *var* sum at gloypa hin fátæka loyniliga.

15 Tú gekst gjøgnum sjógvin við tínum hestum, *igjøgnum* rúgvuna av miklum vøtnum.

16 Tá ið eg hoyrdi, nøtraði mín kviður; mínar varrar titraðu fyri røddini: rotinleiki innfór inn í míni bein, og eg nøtraði í mær sjálvum, at eg mátti hvíla á degi trongdarinnar: tá ið hann kemur upp til fólksins, vil hann loypa á teir við sínum herfylkingum.

17 ¶ Hóast fikutræið skal ikki blóma, eiheldur *skal* ávøkstur *vera* í víntrøunum; strevið hjá olivintræinum skal svitast, og akrarnir skulu ongan mat veita; smáfæafylgið skal verða skorið av frá byrginum, og *tað skal* einkið stórfæafylgi *vera* í fjósunum:

18 Tó vil eg fegnast í HARRANUM, eg vil frøast í Guði frelsu mínar.

19 HARRIN Guð *er* mín styrki, og hann vil gera mínar føtur líka *sum* hinda *føtur,* og hann vil fáa meg at ganga uppiá mínum høgu plássum. Til hins fremsta sangara á mínum streingjaðu ljóðførum.

ZEPHANJAH.

KAPITUL 1

HARRANS orð, sum kom at Zê-phăn´-jăh Cū´-sjī-s syni, Gĕ-dăl´-jăh syni, Ă-măr´-jăh syni, Hĭz´-kī-ăh syni, á døgum Jó´-sĭ-ăh Ámons sonar, Judah kongs.

2 Eg vil fullkomiliga upptæra allar *lutir* oman av landinum, sigur HARRIN.

3 Eg vil upptæra mann og djór; eg vil upptæra fuglar himinsins, og fiskar havsins, og snávingarsteinarnar við teimum vondu; og eg vil skera av mann oman av landinum, sigur HARRIN.

4 Eg vil eisini strekkja út mína hond omanyvir Judah, og omanyvir allar íbúgvar Jerusalems; og eg vil skera av leivdina av Bā´-ăl-i

frá hesum plássi, *og* navn Chĕmă-rĭm´-anna við prestunum;
5 Og teir sum tilbiðja herlið himins uppiá húsatoppunum; og teir sum tilbiðja *og* sum svørja við HARRAN, og sum svørja við Măl´-chăm;
6 Og teir sum eru vendir tilbakar frá HARRANUM; og *teir* sum ei hava søkt HARRAN, ella fregnað eftir honum.
7 Halt tínum friði yvirfyri nærveru Harrans GUÐS: tí at dagur HARRANS *er* fyri hond: tí at HARRIN hevur fyribúgvið eitt sláturoffur, hann hevur boðið sínum gestum.
8 Og tað skal bera á í deginum av sláturofri HARRANS, at eg vil revsa prinsarnar, og kongsbørnini, og allar slíkar sum eru klæddir við fremmandum skarti.
9 Í hinum sama degi eisini vil eg revsa allar teir sum hoppa á gáttini, sum fylla húsini hjá sínum meistarum við harðskapi og sviki.
10 Og tað skal bera á í tí degi, sigur HARRIN, *at vera skal* ljóðið av einum geyli frá fiska-portrinum, og ein ýling frá hinum øðrum, og ein mikil braking frá heyggjunum.
11 Ylið, tit íbúgvar Măk´-tĕsj, tí at øll handilsfólkini eru skorin niður; allir teir, sum bera silvur, eru skornir av.
12 Og tað skal bera á við ta tíðina, *at* eg vil kanna Jerusalem við kertaljósum, og revsa menninar sum eru støðaðir á síni botnføll: sum siga í sínum hjarta, HARRIN vil ei gera gott, eiheldur vil hann gera ilt.
13 Tí skal teirra góðs verða eitt býti, og húsini hjá teimum ein oyðing: teir skulu eisini byggja hús, men ikki íbúgva *tey;* og teir skulu planta víngarðar, men ikki drekka vínið harav.
14 Hin mikli dagur HARRANS *er* nær, *hann er* nær, og skundar stórliga, *enntá* røddin av degi HARRANS: hin mektigi maður skal geyla har beiskliga.
15 Tann dagur *er* ein dagur av vreiði, ein dagur av trongd og neyð, ein dagur av oyðusemi og oyðing, ein dagur av myrkri og niðu, ein dagur av skýggjum og tjúkkum myrkri,
16 Ein dagur av lúðrinum og herrópi ímóti teimum víggirdu staðunum, og ímóti teimum høgu tornunum.
17 Og eg vil føra neyð omanyvir menn, at teir skulu ganga sum blindir menn, av tí at teir hava syndað ímóti HARRANUM: og teirra blóð skal verða helt út sum støv, og teirra kjøt sum skarn.
18 Hvørki teirra silvur ella teirra gull skal vera fært fyri at bjarga teimum í deginum av HARRANS vreiði; men alt landið skal verða upptært við eldinum av ástbrelni hansara: tí at hann skal gera enntá eina snarliga rudding av øllum teimum sum búgva í landinum.

KAPITUL 2

SAVNIÐ tykkum saman, ja, savna saman, O tjóð, *sum ert* ikki tráað *eftir;*
2 Áður enn løgskipanin beri fram, *áður enn* dagurin fari yvir sum dumban, áðrenn hin ógvusliga firtni HARRANS komi uppá tykkum, áður enn dagurin av HARRANS firtni komi uppá tykkum.
3 Søkið tit HARRAN, allir tit eyðmjúku jarðarinnar, sum hava virkað dóm hansara; søkið rættvísi, søkið eyðmýkt: vera má, *at* tit skulu verða fjaldir á deginum av HARRANS firtni.
4 ¶ Tí at Gă´-ză skal verða yvirgivin, og Ăsj´-kĕ-lŏn ein oyðing: teir skulu reka út Ăsj´-dŏd á middeginum, og Ĕk´-rŏn skal verða *slitin* upp við rót.

5 Vei íbúgvum sævarstrand-
arinnar, tjóð Chĕr-ē-thĭt´-anna!
HARRANS orð *er* ímóti tykkum; O
Cānaan, land Philistanna, eg vil
enntá oyðileggja teg, at har skal
eingin íbúgvi vera.
6 Og sævarstrondin skal vera
býlir *og* kroysur til hirðar, og
byrgir til fylgir.
7 Og strondin skal vera til
leivdina av Judah húsi; teir skulu
mata haruppiá: í Ăsj´-kĕ-lŏn-s hús-
um skulu teir leggja *seg* niður
um aftan: tí at HARRIN teirra
Guð skal vitja teir, og venda burt
teirra fangaskapi.
8 ¶ Eg havi hoyrt háð Móabs,
og útspillingar Ammons barna,
við^ hvørjum teir hava háðað mítt
fólk, og gjørt *seg sjálvar* stórar
ímóti landamarki teirra.
9 Tessvegna, *sum* eg livi, sigur
HARRI herliðanna, Guð Ísraels,
Vissuliga, Móab skal vera sum
Sodoma, og Ammons børn sum
Gō-mŏr´-răh, *enntá* dyrkingin av
notum, og saltholum, og ein
viðvarandi oyðing: hitt eftirver-
andi av mínum fólki skal herja
teir, og leivdin av mínum fólki
skal ognast teir.
10 Hetta skulu teir hava fyri
sína hugmóð, av tí at teir hava
háðað og gjørt *seg* stórar ímóti
fólki HARRA herliðanna.
11 HARRIN *vil vera* ræðuligur
at teimum: tí at hann vil svølta
allar gudar jarðarinnar; og *menn*
skulu tilbiðja hann, hvør *og* ēin
frá sínum plássi, *enntá* allar oyggj-
ar hinna heidnu.
12 ¶ Tit Ê-thĭ-ō´-pĭ-arar eisini,
tit *skulu verða* vignir við^ svørði
mínum.
13 Og hann vil strekkja út
sína hond ímóti norðuri, og oyði-
leggja Assýriu; og vil gera Nĭn´-ē-
vēh *til* eina oyðing, *og* turra sum
eina oyðu.
14 Og fylgir skulu leggja *seg*
niður í hennara miðju, øll djór
tjóðanna: bæði hiplingurin og
hegrin skulu halda til í hinum
ovaru duratrøum tess; *teirra* rødd
skal syngja í gluggunum; oyðing
skal vera í gáttunum: tí at hann
skal avhylja sedris*viðar*-verkið.
15 Hetta *er* hin fagnandi stað-
ur sum búði sútloysiligani, sum
segði í sínum hjarta, Eg *eri,* og
tað er eingin umframt meg: hvør
er hon vorðin ein oyðing, eitt
pláss hjá djórum at leggjast nið-
ur í! hvør tann, sum fer framvið
henni, skal físa, *og* vifta *við* hond
síni.

KAPITUL 3

VEI til hennara sum er grav-
skitin og óreinkað, til hinnar
kúgandi borgar!
2 Hon lýddi ikki røddina; hon
tók ikki við rættleiðing; hon leit
ikki á HARRAN; hon dró ikki nær
til Guð sín.
3 Hennara prinsar fyri innan
hana *eru* ýlandi leyvur; hennara
dómarar *eru* kvøld úlvar; teir
gnaga ikki beinini til morgisárið.
4 Hennara prophetar *eru*
lætt*isligir* og svikaligir persónar:
hennara prestar hava óreinkað
halgidómin, teir hava gjørt harð-
skap við lógina.
5 Hin rættláti HARRI *er* í miðjuni
harav; hann vil ei gera misgerð:
hvønn morgun ber hann dóm sín
til ljóss, hann svitast ikki; men
hin órættláti kennir onga skomm.
6 Eg havi skorið av tjóðirnar:
teirra torn eru óbygd; eg gjørdi
teirra gøtur oydnar, at eingin fer
framvið: teirra staðir eru oyddir,
so at har er eingin maður, at har
er eingin íbúgvi.
7 Eg segði, Vissuliga vilt tú
óttast meg, tú vilt taka við rætt-
leiðing; so teirra bústaður skuldi
ikki verða skorin av, hvussu-
sumhelst *ið* eg revsaði teir: men
teir risu árla, *og* spiltu allar sínar
gerðir.

8 ¶ Tessvegna, bíðið tit eftir mær, sigur HARRIN, inntil tann dag sum eg rísi upp til fongin: tí at mín avráðing *er* at savna tjóðirnar, at eg má fylkja kongadømunum, at hella uppá teir mína harmavreiði, *enntá* alla mína ógvusligu firtni: tí at øll jørðin skal verða upptærd við eldinum av míni ástbrelni.

9 Tí at tá vil eg venda til fólkið eitt skírt tungumál, at teir mega allir kalla uppá navn HARRANS, at tæna honum ēinmælt.

10 Frá handanfyri áirnar av Ê-thĭ-ō´-pĭ-ŭ skulu mínir bønligu, *enntá* dóttirin at mínum dreivdu, føra mítt offur.

11 Í tí degi skalt tú ikki skammast yvir allar tínar gerðir, í hvørjum tú hevurt misbrotist ímóti mær: tí at tá vil eg taka burt út úr miðjari tær teir sum fegnast í tínum stoltleika, og tú skalt ei meira vera hástór uppá grund av mínum heilaga fjalli.

12 Eg vil eisini eftirlata í miðjari tær eitt nívt og armt fólk, og teir skulu líta á navn HARRANS.

13 Ísraels leivd skal ei gera misgerð, ella tala lygnir; eiheldur skal ein svikafull tunga verða funnin í teirra munni: tí at teir skulu *ganga* á biti og leggja *seg* niður, og eingin skal gera *teir* ræddar.

14 ¶ Syng, O Zions dóttir; rópa, O Ísrael; ver glað og fegnast við øllum hjartanum, O Jerusalems dóttir.

15 HARRIN hevur tikið burt tínar dómar, hann hevur kastað út tín figginda: Ísraels kongur, *enntá* HARRIN, *er* í miðjari tær: tú skalt ei síggja ilt meira.

16 Í tí degi skal tað verða sagt til Jerusalem, Óttast tú ikki: *og til* Zion, Lat ei tínar hendur vera linar.

17 HARRIN tín Guð í miðjari tær *er* mektigur; hann vil frelsa, hann vil fegnast yvir teg við frøi; hann vil hvíla í sínum kærleika, hann vil frøast yvir teg við synging.

18 Eg vil savna *teir sum eru* sorgarfullir yvir hátíðar-samkomuna, *sum* eru av tær, *fyri hvørjum* skemdin av henni *var* ein byrði.

19 Sí, á teirri tíð vil eg gera til einkiðs allar sum níva teg: og eg vil frelsa hana sum haltar, og savna hana sum varð rikin út; og eg vil fáa teimum lov og giti í hvørjum landi, har teir hava verðið gjørdir til skammar.

20 Á teirri tíð vil eg føra tykkum *aftur,* enntá í tíðini sum eg savni tykkum: tí at eg vil gera tykkum eitt navn og eitt lov millum alt fólk jarðarinnar, tá ið eg vendi tilbakar tykkara fangaskapi frammi fyri eygum tykkara, sigur HARRIN.

HAGGAI.

KAPITUL 1

Í ØÐRUM ári Dá´-rĭ-ŭs-ar kongs, í hinum sætta mánaði, í hinum fyrsta degi mánaðarins, kom orð HARRANS viðˆ Hăg´-gâi propheti at Zĕ-rŭb-bá´-bĕl-i Sjê-ăl´-tĭ-ĕl-s syni, landsstjóra Judah, og til Josjua Jós´-ĕ-dĕch-s sonar, høvuðsprestsins, sigandi,

2 Svá talar HARRI herliðanna, sigandi, Hetta fólk siga, Tíðin er ikki komin, tíðin at HARRANS hús skuldi verða bygt.

3 Tá kom orð HARRANS viðˆ Hăg´-gâi propheti, sigandi,

4 *Er tað* tíð hjá tykkum, O tit, at búgva í tykkara tiljaðu húsum, og hesum húsi *at liggja* oyði?

5 Nú tessvegna, svá sigur

HARRI herliðanna; Umhugsið vegir tykkara.

6 Tit hava sáað nógv, og bera inn lítið; tit eta, men tit hava ikki nóg mikið; tit drekka, men tit verða ikki fyltir við drykki; tit klæða tykkum, men tað er eingin heitur; og hann, sum ávinnur løn, ávinnur løn *til at koyra hana* inn í ein posa við holum.

7 ¶ Svá sigur HARRI herliðanna; Umhugsið vegir tykkara.

8 Farið niðan til fjallsins, og førið við', og byggið húsið; og eg vil hava tokka í tí, og eg vil verða dýrðmettur, sigur HARRIN.

9 Tit væntaðu eftir nógvum, og sí, *tað kom* til lítið; og tá ið tit førdu *tað* heim, blásti eg uppá tað. Hví? sigur HARRI herliðanna. Uppá grund av mínum húsi sum *er* oyði, og tit renna hvør maður at egna húsi sínum.

10 Tí er himinin yvir tykkum *aftur*hildin frá døggi, og jørðin er *aftur*hildin *frá* ávøksti sínum.

11 Og eg kallaði eftir einum turki omanyvir landið, og omanyvir fjøllini, og omanyvir kornið, og omanyvir hitt nýggja vínið, og omanyvir oljuna, og omanyvir *tað* sum lendið ber fram, og omanyvir menn, og omanyvir fenað, og omanyvir alt strev handanna.

12 ¶ Tá lýddu Zĕ-rūb-bá´-bĕl Sjê-ăl´-tī-ĕl-s sonur, og Josjua Jós´-ē-dĕch-s sonur, høvuðspresturin, við allari leivdini av fólkinum, rødd HARRANS Guðs síns, og orðum Hăg´-gâi-s prophets, eins og HARRIN Guð teirra hevði sent honum, og fólkið óttaðist frammi fyri HARRANUM.

13 Tá talaði Hăg´-gâi, sendiboð HARRANS, í boðskapi HARRANS við fólkið, sigandi, Eg *eri* við tykkum, sigur HARRIN.

14 Og HARRIN vakti upp anda Zĕ-rūb-bá´-bĕl-s Sjê-ăl´-tī-ĕl-s sonar, landsstjóra Judah, og anda Josjua Jós´-ē-dĕch-s sonar, høvuðsprestsins, og andan hjá allari leivdini av fólkinum; og teir komu og arbeiddu í húsi HARRA herliðanna, Guðs síns,

15 Í hinum fýra og tjúgunda degi hins sætta mánaðar, í øðrum ári Dá´-rī-ŭs-ar kongs.

KAPITUL 2

Í SJEYNDA *mánaðinum,* í ēin og tjúgunda *deginum* av mánaðinum, kom orð HARRANS við prophetinum Hăg´-gâi, sigandi,

2 Tala nú til Zĕ-rūb-bá´-bĕl-s Sjê-ăl´-tī-ĕl-s sonar, landsstjóra Judah, og til Josjua Jós´-ē-dĕch-s sonar, høvuðsprestsins, og til hins eftirverandi av fólkinum, sigandi,

3 Hvør *er* eftir tykkara millum, sum sá hetta hús í hennara fyrstu dýrd? og hvussu síggja tit tað nú? *er tað* ikki í eygum tykkara í samanburði við tað sum einkið?

4 Tó nú, ver sterkur, O Zĕ-rūb-bá´-bĕl, sigur HARRIN; og ver sterkur, O Josjua, Jós´-ē-dĕch-s sonur, høvuðspresturin; og verið sterkir, øll tit fólk landsins, sigur HARRIN, og arbeiðið: tí at eg *eri* við tykkum, sigur HARRI herliðanna:

5 *Samsvarandi við* orðið, sum eg sáttmálaði við tykkum, tá ið tit komu út úr Egyptalandi, soleiðis mín andi verður verandi tykkara millum: óttist tit ikki.

6 Tí at svá sigur HARRI herliðanna; Enn ēinaferð, tað *er* eitt lítið bil, og eg vil skaka himnarnar, og jørðina, og sjógvin, og tað turra *landið;*

7 Og eg vil skaka allar tjóðir, og tráin hjá øllum tjóðum skal koma: og eg vil fylla hetta húsið við dýrd, sigur HARRI herliðanna.

8 Silvurið *er* mítt, og gullið *er* mítt, sigur HARRI herliðanna.

9 Dýrdin hjá hesum seinna húsinum skal verða størri enn hjá hinum fyrra, sigur HARRI herliðanna: og í hesum plássi vil eg geva frið, sigur HARRI herliðanna.

10 ¶ Í tí fýra og tjúgunda *deginum* av tí níggjunda *mánaðinum,* í øðrum ári Dá´-rĭ-ŭs-ar, kom HARRANS orð viðˆ Hăg´-gaî propheti, sigandi,

11 Svá sigur HARRI herliðanna; Spyr nú prestarnar *viðvíkjandi* lógini, sigandi,

12 Um ēin beri heilagt kjøt í skeytinum av klæði sínum, og við sínum skeyti nerti við breyð, ella súpan, ella vín, ella olju, ella nakran mat, skal tað verða heilagt? Og prestarnir svaraðu og søgdu, Nei.

13 Tá segði Hăg´-gaî, Um *ēin, sum er* óreinur av einum deyðum likami, nerti við nakað av hesum, skal tað verða óreint? Og prestarnir svaraðu og søgdu, Tað skal verða óreint.

14 Tá svaraði Hăg´-gaî, og segði, Soleiðis *er* hetta fólk, og soleiðis *er* henda tjóð frammi fyri mær, sigur HARRIN; og soleiðis *er* hvørt verk av hondum teirra; og tað, sum teir ofra har, *er* óreint.

15 Og nú, eg biði tykkum, umhugsið frá hesum degi og uppeftir, frá áðrenn ein steinur varð lagdur uppá ein stein í templi HARRANS:

16 Síðan teir *dagarnir* vóru, tá ið *ēin* kom til eina rúgvu á tjúgu *mát,* vóru tað *bert* tíggju: tá ið *ēin* kom til persufitina fyri at draga út fimti *ker* út úr persuni, vóru tað *bert* tjúgu.

17 Eg sló tykkum við svartaroða og við gulnan og við hegli í øllum strevum handa tykkara; tó *vendu* tit ikki til mín, sigur HARRIN.

18 Umhugsið nú frá hesum degi og uppeftir, frá tí fýra og tjúgunda deginum av tí níggjunda *mánaðinum, enntá* frá tí degi sum grundvøllurin av HARRANS templi varð lagdur, umhugsið *tað*.

19 Er sáðið enn í løðuni? ja, sum enn *er* hevur víntræið, og fikutræið, og granateplatræið, og olivintræið, ikki borið fram: frá hesum degi vil eg vælsigna *tykkum*.

20 ¶ Og aftur kom orð HARRANS at Hăg´-gaî í tí fýra og tjúgunda *deginum* av mánaðinum, sigandi,

21 Tala til Zĕ-rŭb-bá´-bĕl-s, landsstjóra Judah, sigandi, Eg vil skaka himnarnar og jørðina;

22 Og eg vil kollrenna hásætið hjá kongadømum, og eg vil oyðileggja styrkina hjá kongadømum hinna heidnu; og eg vil kollrenna hervagnarnar, og teir sum ríða í teimum; og hestarnir og teirra reiðmenn skulu koma niður, hvør *og* ēin viðˆ svørði bróðurs síns.

23 Í tí degi, sigur HARRI herliðanna, vil eg taka teg, O Zĕ-rŭb-bá´-bĕl, tænara mín, son Sjê-ăl´-tĭ-ĕl-s, sigur HARRIN, og vil gera teg sum ein innsiglis*ring:* tí at eg havi útvalt teg, sigur HARRI herliðanna.

ZECHARJAH.

KAPITUL 1

Í TÍ áttanda mánaðinum, í øðrum ári Dá´-rĭ-ŭs-ar, kom orð HARRANS at Zĕch-ăr´-jăh, Bĕrĕ-chĭ´-ăh syni, Ĭd´-dō syni, prophetinum, sigandi,

2 HARRIN hevur verið sára misnøgdur við fedrar tykkara.

3 Tessvegna sig tú við teir, Svá sigur HARRI herliðanna; Vendið tit at mær, sigur HARRI herliðanna, og eg vil venda at tykkum, sigur HARRI herliðanna.

4 Verið tit ikki eins og tykkara fedrar, at hvørjum hinir fyrri prophetar hava rópt, sigandi, Svá sigur HARRI herliðanna; Vendið tit

nú frá illu vegum tykkara, og *frá* illu gerðum tykkara: men teir hoyrdu ikki, ella góvu gætur at mær, sigur HARRIN.

5 Tykkara fedrar, hvar *eru* teir? og prophetarnir, liva teir um ævir?

6 Men míni orð og mínar ásetingar, sum eg ábjóðaði mínum tænarum prophetunum, tóku tey ikki hald á fedrum tykkara? og teir vendu aftur og søgdu, Líka sum HARRI herliðanna hugsaði at gera at okkum, samsvarandi við okkara vegir, og samsvarandi við okkara gerðir, soleiðis hevur hann farið við okkum.

7 ¶ Uppá hin fýra og tjúgunda dagin av tí ellivta mánaðinum, sum *er* mánaðurin Sĕ´-băt, í øðrum ári Dá´-rĭ-ŭs-ar, kom orð HARRANS at Zĕch-ăr´-jăh, Bĕr-ĕchĭ´-ăh syni, Ĭd´-dō syni, prophetinum, sigandi,

8 Eg sá um nátt*ina,* og sí ein maður, ríðandi uppiá einum reyðum hesti, og hann stóð millum myrtutræanna, sum *vóru* í botninum; og aftanfyri hann *vóru tað* reyðir hestar, flekkutir, og hvítir.

9 Tá segði eg, O harri mín, hvat *eru* hesir? og eingilin, sum talaði við meg, segði við meg, Eg vil sýna tær hvat hesir *veri seg*.

10 Og maðurin, sum stóð millum myrtutræanna, svaraði og segði, Hetta *eru teir* sum HARRIN hevur sent at ganga til og frá gjøgnum jørðina.

11 Og teir svaraðu eingli HARRANS, sum stóð millum myrtutræanna, og søgdu, Vit hava gingið til og frá gjøgnum jørðina, og sí, øll jørðin situr still, og er við ró.

12 ¶ Tá svaraði eingil HARRANS og segði, O HARRI herliðanna, hvussu leingi vilt tú ikki hava miskunn á Jerusalem og á staðirnar av Judah, ímóti hvørjum tú hevurt havt harmavreiði hesi trísinstjúgu og tíggju ár?

13 Og HARRIN svaraði einglinum sum talaði við meg, *við* góðum orðum *og* ugganarsomum orðum.

14 So eingilin, sum samtalaði við meg, segði við meg, Rópa tú, sigandi, Svá sigur HARRI herliðanna; Eg eri ástbrellin yvir Jerusalem og yvir Zion við eini miklari ástbrelni.

15 Og eg eri sera sára misnøgdur við hinar heidnu *sum eru* við ró: tí at eg var bert eitt sindur misnøgdur, og teir hjálptu frameftir kvølini.

16 Tessvegna, svá sigur HARRIN; Eg eri vendur aftur til Jerusalem við miskunnum: mítt hús skal verða bygt í tí, sigur HARRI herliðanna, og eitt band skal verða tant út uppá Jerusalem.

17 Rópa enn, sigandi, Svá sigur HARRI herliðanna; Mínir staðir, ígjøgnum framgongd, skulu enn verða spreiddir útumkring; og HARRIN skal enn ugga Zion, og skal enn velja Jerusalem.

18 ¶ Tá lyfti eg upp eygum mínum, og sá, og sí fýra horn.

19 Og eg segði við eingilin sum talaði við meg, Hvat *veri* hesi? Og hann svaraði mær, Hesi *eru* hornini sum hava spjatt Judah, Ísrael, og Jerusalem.

20 Og HARRIN sýndi mær fýra træsmiðir.

21 Tá segði eg, Hvat koma hesir at gera? Og hann talaði, sigandi, Hesir *eru* hornini sum hava spjatt Judah, so at eingin maður lyfti upp høvur sítt: men hesir eru komnir at styggja teir, at kasta út hornini hjá Heidningunum, sum lyftu upp *sítt* horn yvir Judah land at spjaða tað.

KAPITUL 2

EG lyfti upp eygum mínum aftur, og hugdi, og sí ein maður við eini mátilinju í síni hond.

2 Tá segði eg, Hvagar fert tú? Og hann segði við meg, At máta

Jerusalem, at sjá hvat *er* breiddin
harár, og hvat *er* longdin harár.
3 Og sí, eingilin, sum talaði við
meg, fór fram, og ein annar eingil
fór út at møta honum,
4 Og segði við hann, Renn,
tala til henda unga mann, sig-
andi, Jerusalem skal verða búð í
sum býir uttan múrar fyri fjøldina
av monnum og fenaði harí:
5 Tí at eg, sigur HARRIN,
vil vera henni ein múrur av eldi
rundan um, og vil vera dýrdin í
miðjuni av henni.
6 ¶ Hey, hey, *komið fram*, og
flýggið frá landi norðursins, sigur
HARRIN: tí at eg havi spreitt tykk-
um útumkring sum hinar fýra
vindar himinsins, sigur HARRIN.
7 Bjarga tær, O Zion, sum býrt
hjá dóttur Bábylons.
8 Tí at svá sigur HARRI herlið-
anna; Eftir dýrdini hevur hann
sent meg til tjóðirnar sum rændu
tykkum: tí at hann, sum nemur
tykkum, nemur stein eyga hans.
9 Tí at sí, eg vil rista mína hond
uppá teir, og teir skulu verða eitt
rán fyri tænarum sínum: og tit
skulu vita, at HARRI herliðanna
hevur sent meg.
10 ¶ Syng og fegnast, O Zions
dóttir: tí at sí, eg komi, og eg vil
búgva í miðjari tær, sigur HARRIN.
11 Og mangar tjóðir skulu
verða sameintar til HARRANS á
tí degi, og skulu vera fólk mítt:
og eg vil búgva í miðjari tær, og
tú skalt vita at HARRI herliðanna
hevur sent meg at tær.
12 Og HARRIN skal arva Judah
sín skamt, í hinum heilaga landi,
og skal velja Jerusalem aftur.
13 Ver stilt, O alt kjøt, frammi
fyri HARRANUM: tí at hann er
reistur upp úr sínum heilaga býli.

KAPITUL 3

OG hann sýndi mær Josjua
høvuðsprest, standandi fram-
mi fyri eingli HARRANS, og Satan
standandi við høgru hond hans
at mótstanda honum.
2 Og HARRIN segði við Satan,
HARRIN harti teg, O Satan; enn-
tá HARRIN, sum hevur valt Jeru-
salem, harti teg: *er* ikki hesin ein
kyndil, ryktur út úr eldinum?
3 Nú, Josjua var klæddur við
gravskitnum klæðum, og stóð
frammi fyri einglinum.
4 Og hann svaraði og talaði
við teir sum stóðu frammi fyri
honum, sigandi, Takið burt hini
gravskitnu klæðir frá honum. Og
við hann segði hann, Sí, eg havi
elvt tíni misgerð at ferðast frá
tær, og eg vil klæða teg við skifti
av klædnaði.
5 Og eg segði, Lat teir seta
eina vakra vavhúgvu uppá høvur
hans. So teir settu eina vakra
vavhúgvu uppá høvur hans, og
klæddu hann við klæðum. Og
eingil HARRANS stóð hjá.
6 Og eingil HARRANS fastsló at
Josjua, sigandi,
7 Svá sigur HARRI herliðanna;
Um tú vilt ganga í vegum mín-
um, og um tú vilt halda álegging
mína, tá skalt tú eisini døma hús
mítt, og skalt eisini varða for-
garðar mínar, og eg vil geva tær
plássˇ at ganga millum hesar sum
standa hjá.
8 Hoyr nú, O Josjua, høvuðs-
presturin, tú, og tínir felagar
sum sita frammi fyri tær: tí at
teir *eru* menn — undraðir eftir:
tí at sí, eg vil føra fram tænara
mín — GREININA.
9 Tí at sí steinin sum eg havi
lagt frammi fyri Josjua; uppiá
ēinum steini *skulu vera* sjey eygu:
sí eg vil írista risting hans, sigur
HARRI herliðanna, og eg vil firra
misgerðina hjá tí landinum í ēin-
um degi.
10 Í tí degi, sigur HARRI her-
liðanna, skulu tit kalla hvør mað-
ur næsta sín undir víntræið og
undir fikutræið.

KAPITUL 4

OG eingilin, sum talaði við meg, kom aftur, og vakti meg, eins og ein maður sum verður vaktur úr svøvni sínum,

2 Og segði við meg, Hvat sært tú? Og eg segði, Eg havi hugt, og sí ein kertastaki allur *av* gulli, við eini skál uppiá toppinum av honum, og hansara sjey lampur hará, og sjey pípur til hinar sjey lampurnar sum *eru* uppiá toppi hans:

3 Og tvey olivintrø hjá" honum, ēin uppiá høgru *síðu*ni av skálini, og hīn uppiá vinstru *síðu*ni harav.

4 So eg tók til orða og talaði til eingilin sum talaði við meg, sigandi, Hvat *eru* hesi, harri mín?

5 Tá svaraði eingilin sum talaði við meg, og segði við meg, Veitst tú ikki hvat hesi veri *seg?* Og eg segði, Nei, harri mín.

6 Tá svaraði hann og talaði við meg, sigandi, Hetta *er* orð HARRANS til Zĕ-rūb-bá´-bĕl-s, sigandi, Ikki viðˆ makt, ella viðˆ kraft, men viðˆ anda mínum, sigur HARRI herliðanna.

7 Hvør *ert* tú, O mikla fjall? frammi fyri Zĕ-rūb-bá´-bĕl-i *skalt tú verða* ein slætti: og hann skal bera fram høvuðs stein *tess við* rópanum, *geylandi,* Náði, náði at honum.

8 Harafturat kom orð HARRANS at mær, sigandi,

9 Hendur Zĕ-rūb-bá´-bĕl-s hava lagt grundvøllin av hesum húsi; hendur hansara skulu eisini fullgera tað; og tú skalt vita, at HARRI herliðanna hevur sent meg at tykkum.

10 Tí at hvør hevur vanvirt dagin av smáum tingum? tí at teir skulu fegnast, og skulu síggja loddið í hondini hjá Zĕ-rūb-bá´-bĕl-i *við* hasum sjey; tey *eru* eygu HARRANS, sum renna til og frá gjøgnum alla jørðina.

11 ¶ Tá tók eg til orða, og segði við hann, Hvat *eru* hesi tvey olivintrøini uppiá høgru *síðu*ni av ljósastakanum og uppiá vinstru *síðu* hans?

12 Og eg tók til orða aftur, og segði við hann, Hvat *veri hesar* tvær olivingreinar, sum gjøgnum hinar gyltu pípur tøma hina gyltu *olju* út úr sær?

13 Og hann svaraði mær og segði, Veitst tú ikki hvat hesar *veri seg?* Og eg segði, Nei, harri mín.

14 Tá segði hann, Hesar *eru* hinir tveir salvaðu, sum standa hjá Harra heilu jarðarinnar.

KAPITUL 5

TÁ vendi eg, og lyfti upp eygum mínum, og hugdi, og sí ein flúgvandi rulla.

2 Og hann segði við meg, Hvat sært tú? Og eg svaraði, Eg síggi eina flúgvandi rullu; longdin hará *er* tjúgu alnir, og breiddin hará tíggju alnir.

3 Tá segði hann við meg, Hetta *er* banningin sum gongur fram yvir ásjón alrar jarðarinnar: tí at hvør tann, sum stjelur, skal verða skorin av *sum* hesumegin samsvarandi við hana; og hvør tann, sum svør, skal verða skorin av *sum* hasumegin samsvarandi við hana.

4 Eg vil bera hana fram, sigur HARRI herliðanna, og hon skal innfara inn í húsið hjá tjóvinum, og inn í húsið hjá honum sum svør falsligani við mítt navn: og hon skal verða verandi í miðjum húsi hansara, og skal upptæra tað við timbri tess og steinum tess.

5 ¶ Tá fór eingilin, sum talaði við meg, fram, og segði við meg, Lyft upp nú eygum tínum, og sjá hvat *er* hetta sum gongur út.

6 Og eg segði, Hvat *er* tað? Og hann segði, Hetta *er* ein ē´-phâh sum gongur út. Hann segði harafturat, Hetta *er* teirra líkleiki gjøgnum alla jørðina.

7 Og sí, har varð lyft upp ein talent av blýggi: og hetta *er* ein kvinna sum situr í miðjuni av ē´-phâh-ini.

8 Og hann segði, Hetta *er* vondska. Og hann kastaði tað inn í miðjuna av ē´-phâh-ini; og hann kastaði vektina av blýggi uppá munnan hará.

9 Tá lyfti eg upp eygum mínum, og hugdi, og sí, har komu út tvær kvinnur, og vindurin *var* í teirra veingjum; tí at tær høvdu veingir sum veingirnir hjá einum storki: og tær lyftu upp ē´-phâh-ina ímillum jørðina og himinin.

10 Tá segði eg til eingilin sum talaði við meg, Hvagar bera hesar ē´-phâh-ina?

11 Og hann segði við meg, At byggja henni eitt hús í landi Sjī´-nâr-s: og hon skal verða grundfest, og sett har uppá sína egnu grund.

KAPITUL 6

OG eg vendi, og lyfti upp eygum mínum, og hugdi, og sí, tað komu fýra vagnar út frá ímillum tvey fjøll; og fjøllini *vóru* fjøll av messing.

2 Í tí fyrsta vagninum *vóru* reyðir hestar; og í øðrum vagninum svartir hestar;

3 Og í tí triðja vagninum hvítir hestar; og í tí fjórða vagninum flekkutir og dimmreyðir hestar.

4 Tá tók eg til orða og segði við eingilin sum talaði við meg, Hvat *eru* hesir, harri mín?

5 Og eingilin svaraði og segði við meg, Hesir *eru* hinir fýra andar himnanna, sum fara fram frá at standa frammi fyri Harra alrar jarðarinnar.

6 Teir svørtu hestarnir, sum *eru* harí, fara fram í norður landið; og teir hvítu fara fram aftaná teimum; og hinir flekkutu fara fram ímóti suður landinum.

7 Og teir dimmreyðu fóru fram, og royndu at fara, at teir máttu ganga til og frá gjøgnum jørðina: og hann segði, Sleppið tykkum hiðani, gangið til og frá gjøgnum jørðina. So teir gingu til og frá gjøgnum jørðina.

8 Tá rópti hann uppá meg, og talaði við meg, sigandi, Sí, hesir, sum fara ímóti norður landinum, hava gjørt stillan mín anda í norður landinum.

9 ¶ Og HARRANS orð kom at mær, sigandi,

10 Tak av *teimum av* fangaskapinum, *enntá* av Hěl´-dâ-ì, av Tó-bī´-jăh, og av Jĕ-dâ-ì´-ăh, sum eru komnir frá Bábylon, og kom tú hin sama dagin, og far inn í hús Jó´-sī-ăh Zê-phăn´-jăh sonar;

11 So tak silvur og gull, og ger krúnur, og koyr *tær* uppá høvur Josjua Jós´-ĕ-dĕch-s sonar, høvuðsprestsins;

12 Og tala við hann, sigandi, Svá talar HARRI herliðanna, sigandi, Sí mannin, hvørs navn *er* GREININ; og hann skal vaksa upp út úr plássi sínum, og hann skal byggja tempul HARRANS:

13 Enntá hann skal byggja tempul HARRANS; og hann skal bera dýrdina, og skal sita og stjórna uppiá hásæti sínum; og hann skal vera ein prestur uppiá hásæti sínum: og ráð friðarins skal vera ímillum teir báðar.

14 Og krúnurnar skulu vera til Hē´-lĕm-s, og til Tó-bī´-jăh, og til Jĕ-dâ-ì´-ăh, og til Hen-s Zê-phăn´-jăh sonar, til eitt minni í templi HARRANS.

15 Og teir, *sum eru* langt burturi, skulu koma og byggja í templi HARRANS, og tit skulu vita, at HARRI herliðanna hevur sent meg at tykkum. Og *hetta* skal bera á, um tit vilji dúgliga lýða rødd HARRANS Guðs tykkara.

KAPITUL 7

OG tað bar á í tí fjórða árinum hjá kong Dá´-rī-ŭs-i, *at*

HARRANS orð kom at Zěch-ăr´-jăh í hinum fjórða *degi* hins níggjunda mánaðar, *enntá* í Chĭs´-lĕv;

2 Tá ið teir høvdu sent at húsi Guðs Sjĕr-ē´-zĕr og Rē´-gĕm-mĕl´-ĕch, og teirra menn, at biðja frammi fyri HARRANUM,

3 *Og* at tala við prestarnar sum *vóru* í húsi HARRA herliðanna, og til prophetanna, sigandi, Skuldi eg grátið í tí fimta mánaðinum, atskiljandi meg sjálvan, eins og eg havi gjørt hesi so mongu ár?

4 ¶ Tá kom orð HARRA herliðanna at mær, sigandi,

5 Tala yvirat øllum fólki landsins, og til prestanna, sigandi, Tá ið tit fastaðu og harmaðu í tí fimta og sjeynda *mánaðinum,* enntá hasi sjeyti árini, fastaðu tit yvirhøvur at mær, *enntá* fyri mær?

6 Og tá ið tit ótu, og tá ið tit drukku, ótu tit ikki *tykkara sjálvs vegna,* og drukku *tykkara sjálvs vegna?*

7 *Skuldu tit* ikki *hoyra* orðini sum HARRIN hevur rópað við hinum fyrri prophetum, tá ið Jerusalem var búð í og í framgongd, og staðirnir harav runt umkring hana, tá ið *menn* íbúðu suður*land*ið og slættan?

8 ¶ Og HARRANS orð kom at Zěch-ăr´-jăh, sigandi,

9 Svá talar HARRI herliðanna, sigandi, Útinnið sannan dóm, og sýnið miskunn og várkunnir hvør maður móti bróður sínum:

10 Og kúgið ikki einkjuna, ella hin faðirleysa, hin fremmanda, ella hin fátæka; og lat ongan av tykkum ímynda ilt ímóti bróður sínum í hjarta tykkara.

11 Men teir sýttu at geva gætur, og hálaðu burt økslina, og stappaðu síni oyru, at teir skuldu ikki hoyra.

12 Ja, teir gjørdu hjørtu síni *sum* ein diamant stein, at ikki teir skuldu hoyra lógina, og orðini sum HARRI herliðanna hevði sent í anda sínum við hinum fyrri prophetum: tí kom ein mikil vreiði frá HARRA herliðanna.

13 Tí er tað borið á, *at* eins og hann rópaði, og teir vildu ikki hoyra; soleiðis rópaðu teir, og eg vildi ikki hoyra, sigur HARRI herliðanna:

14 Men eg spjaddi teir við einum meldurvindi millum alra tjóðanna, hvørjar teir kendu ikki. Soleiðis var landið oyði eftir teir, at eingin maður fór ígjøgn ella vendi aftur: tí at teir løgdu hitt yndisliga land oyði.

KAPITUL 8

AFTUR kom orð HARRA herliðanna *til mín,* sigandi,

2 Svá sigur HARRI herliðanna; Eg var ástbrellin yvir Zion við miklari ástbrelni, og eg var ástbrellin yvir hana við miklari øði.

3 Svá sigur HARRIN; Eg eri vendur aftur at Zion, og vil búgva í miðjuni av Jerusalem: og Jerusalem skal verða kallað ein sannleiks staður; og fjallið hjá HARRA herliðanna — hitt heilaga fjallið.

4 Svá sigur HARRI herliðanna; Tað skulu enn gamlir menn og gamlar kvinnur dvøljast í gøtum Jerusalems, og hvør maður við sínum stavi í síni hond fyri beran aldur.

5 Og gøtur staðarins skulu vera fullar av dreingjum og gentum, spælandi í gøtum hans.

6 Svá sigur HARRI herliðanna; Um tað veri undrunarvert í eygunum á leivdini av hesum fólki í hesum døgum, skuldi tað eisini verið undrunarvert í eygum mínum? sigur HARRI herliðanna.

7 Svá sigur HARRI herliðanna; Sí, eg vil frelsa fólk mítt frá eystur landinum, og frá vestur landinum;

8 Og eg vil føra teir, og teir skulu búgva í miðjuni av Jerusalem: og teir skulu vera fólk

mítt, og eg vil vera Guð teirra, í sannleika og í rættvísi.

9 ¶ Svá sigur HARRI herliðanna; Latið hendur tykkara vera sterkar, tit sum hoyra í hesum døgum hesi orð við munni prophetanna, sum *vóru* á tí degi *sum* grundvøllurin av húsi HARRA herliðanna varð lagdur, at templið mátti verða bygt.

10 Tí at undan hesum døgum var eingin løn til mann, ella nøkur løn til djór; eiheldur *var nakar* friður hjá honum sum fór út ella kom inn, uppá grund av kvølini: tí at eg setti allar menn, hvønn *og* ēin ímóti næsta sínum.

11 Men nú *vil* eg ikki *vera* yvirfyri hinum eftirverandi av hesum fólki sum í hinum fyrru døgum, sigur HARRI herliðanna.

12 Tí at sáðið *skal vera* framgangsríkt; víntræið skal geva sín ávøkst, og lendið skal geva sína grøði, og himnarnir skulu geva sína døgg; og eg vil elva leivdini av hesum fólki at ognast øll hesi *ting*.

13 Og tað skal bera á, *at* eins og tit vóru ein banning hinna heidnu millum, O Judah hús, og Ísraels hús; soleiðis vil eg frelsa tykkum, og tit skulu verða ein signing: óttist ikki, *men* latið hendur tykkara vera sterkar.

14 Tí at svá sigur HARRI herliðanna; Eins og eg hugsaði at revsa tykkum, tá ið tykkara fedrar tirraðu meg til vreiðis, sigur HARRI herliðanna, og eg iðraðist ikki:

15 Soleiðis aftur havi eg hugsað í hesum døgum at gera væl at Jerusalem og við Judah hús: óttist tit ikki.

16 ¶ Hetta *eru* tingini sum tit skulu gera; Talið tit hvør maður sannleikan til næsta sín; útinnið dóm sannleikans og friðar*ins* í portrum tykkara:

17 Og lat ongan av tykkum ímynda ilt í hjørtum tykkara ímóti næsta sínum; og elskið ongan falskan eið: tí at øll hesi *eru ting* sum eg hati, sigur HARRIN.

18 ¶ Og orð HARRA herliðanna kom at mær, sigandi,

19 Svá sigur HARRI herliðanna; Føsta hins fjórða *mánaðar*, og føsta hins fimta, og føsta hins sjeynda, og føsta hins tíggjunda, skulu vera fyri Judah húsi frøi og gleði, og gleimfullar veitslur; tessvegna elskið sannleikan og frið.

20 Svá sigur HARRI herliðanna; *Tað skal* enn *bera á,* at tað skulu koma fólk, og íbúgvarnir av mongum staðum:

21 Og íbúgvarnir av ēinum *staði* skulu fara til ein annan, sigandi, Lat okkum fara snarligani at biðja frammi fyri HARRANUM, og at søkja HARRA herliðanna: eg vil fara eisini.

22 Ja, mong fólk og sterkar tjóðir skulu koma at søkja HARRA herliðanna í Jerusalem, og at biðja frammi fyri HARRANUM.

23 Svá sigur HARRI herliðanna; Í teimum døgum *skal tað bera á,* at tíggju menn skulu taka hald burturúr øllum tungumálum hjá tjóðunum, enntá skulu taka hald á skeytinum hjá honum sum er ein Jødi, sigandi, Vit vilja fara við tykkum: tí at vit hava hoyrt, *at* Guð *er* við tykkum.

KAPITUL 9

BYRÐI HARRANS orðs í landi Há-drach-s, og Damascus *skal vera* hvíld tess: tá ið eygu mans, eins og hjá øllum ættargreinum Ísraels, *skulu vera* mótvegis HARRANUM.

2 Og Há-māth eisini skal greinsa harhjá; Týr-rūs, og Zī-dōn, tó *at* tað veri *seg* sera víst.

3 Og Týr-rūs bygdi sær sjálvari eitt hervirki, og rúgvaði upp silvur sum dustið, og fínt gull sum gatnanna evju.

4 Sí, Harrin vil kasta hana út,

og hann vil sláa hennara mátt í havinum; og hon skal verða upptærd við eldi.

5 Ăsj´-kĕ-lŏn skal sjá *tað,* og óttast; Gă´-ză eisini *skal sjá tað,* og verða sera sorgarfull, og Êk´-rŏn; tí hennara eftirvæntan skal skammast; og kongurin skal týnast frá Gă´-ză, og Ăsj´-kĕ-lŏn skal ikki verða búð í.

6 Og eitt óektabarn skal búgva í Ăsj´-dŏd, og eg vil skera av hugmóð Philistanna.

7 Og eg vil taka burt hansara blóð út úr hans munni, og hans andstygdir frá ímillum hansara tenn: men hann ið verður verandi, enntá hann *skal vera* til Guðs várs, og hann skal vera sum ein landsstjóri í Judah, og Êk´-rŏn sum ein Jĕb-ŭ-sīt´-i.

8 Og eg vil leirast íkring hús mítt orsakað av herinum, orsakað av honum sum fer framvið, og orsakað av honum sum vendir aftur: og eingin kúgari skal fara ígjøgnum teir meira: tí at nú havi eg sæð við eygum mínum.

9 ¶ Frø *teg* stórligani, O Zions dóttir; rópa, O Jerusalems dóttir: sí, Kongur tín til tín kemur: hann *er* rættlátur, og havandi frelsu; lítillátur, og ríðandi uppiá einum asna, og uppiá einum asnafyli — fylinum hjá einum asna.

10 Og eg vil skera av hervagnin frá Ē´-phră-ĭm, og hestin frá Jerusalem, og bardagabogin skal verða skorin av: og hann skal tala frið við hinar heidnu: og hans harradømi *skal vera* frá havi *enntá* til havs, og frá ánni *enntá* til endar jarðarinnar.

11 Hvat viðvíkur tær eisini, við blóði sáttmála tíns havi eg sent fram tínar fangar út úr holuni, í hvørji einkið vatn *er*.

12 ¶ Vendið tykkum til hervirkið, tit vónar fangar: enntá í dag kunngeri eg, *at* eg vil rinda tær tvífalt;

13 Tá ið eg havi spent Judah fyri meg, fylt bogan við Ē´-phră-ĭm, og reist upp tínar synir, O Zion, ímóti sonum tínum, O Grikkaland, og gjørt teg sum svørðið hjá einum mektigum manni.

14 Og HARRIN skal verða sæddur yvir teimum, og hans ørv skal fara fram sum snarljósið: og Harrin GUÐ skal blása lúðurin, og skal fara við meldurvindum úr suðuri.

15 HARRI herliðanna skal verja teir; og teir skulu upptæra, og undirleggja við sleingjusteinum; og teir skulu drekka, *og* gera eitt ljóð sum ígjøgnum vín; og teir skulu verða fyltir líka *sum offur*bollar, *og* sum hjørn altarsins.

16 Og HARRIN teirra Guð skal frelsa teir á tí degi sum fylgi fólks síns: tí at *teir skulu vera sum* steinarnir hjá eini krúnu, lyftir upp sum eitt hermerki uppá land hans.

17 Tí at hvør mikil *er* góðska hans, og hvør mikil *er* vakurleiki hans! korn skal gera teir ungu menninar kætifullar, og nýtt vín moyggjarnar.

KAPITUL 10

UMBIÐJIÐ tit av HARRANUM regn í tíðini av tí seinna regninum; *so* skal HARRIN gera bjørt skýggj, og geva teimum skúrir av regni, til hvønn *og* ein gras á akrinum.

2 Tí at hjágudarnir hava talað fáfongd, og spásagnarmenninir hava sæð eina lygn, og hava sagt frá følskum dreymum; teir ugga til fánýtis: tí fóru teir sín veg sum eitt fylgi, teir vórðu órógvaðir, av tí at *har var* eingin hirði.

3 Mín firtni varð kynd ímóti hirðunum, og eg revsaði geitirnar: tí at HARRI herliðanna hevur vitjað sítt fylgi — Judah hús, og hevur gjørt teir sum sín glæsiliga hest í bardaganum.

4 Út úr honum kom fram horn*steinurin,* út úr honum naglin, út úr honum bardagabogin, út úr honum hvør kúgari tilsaman.
5 ¶ Og teir skulu vera sum mektigir *menn,* sum traðka niður *sínar figgindar* í gatnanna evju í bardaganum: og teir skulu berjast, av tí at HARRIN *er* við teimum, og reiðmenninir á hestum skulu fimlast.
6 Og eg vil styrkja hús Judah, og eg vil frelsa hús Jósephs, og eg vil føra teir aftur til at staðseta teir; tí at eg havi miskunn yvir teir: og teir skulu vera sum um eg hevði ikki kastað teir av: tí at eg *eri* HARRIN Guð teirra, og vil hoyra teir.
7 Og *teir av* Ē′phră-ĭm skulu vera sum ein mektigur *maður,* og teirra hjarta skal fegnast sum ígjøgnum vín: ja, teirra børn skulu síggja *tað,* og verða glaðir; teirra hjarta skal fegnast í HARRANUM.
8 Eg vil fisa eftir teimum, og savna teir; tí at eg havi endurloyst teir: og teir skulu økjast sum teir hava øktst.
9 Og eg vil sáða teir millum fólksins: og teir skulu minnast til mín í fjarskotnum londum; og teir skulu liva við børnum sínum, og venda aftur.
10 Eg vil føra teir aftur eisini út úr Egyptalandi, og savna teir út úr Assýriu; og eg vil føra teir inn í land Gileads og Lĭ′bă-nŏn; og *pláss* skal ei verða funnið til teirra.
11 Og hann skal fara ígjøgnum havið við kvøljan, og skal lemja aldurnar í sjónum, og øll djúpini av ánni skulu torna upp: og hugmóðin hjá Assýriu skal verða førd niður, og Egyptalands veldisstavur skal víkja burt.
12 Og eg vil styrkja teir í HARRANUM; og teir skulu ganga niðan og oman í navni hansara, sigur HARRIN.

KAPITUL 11

LAT upp tínar hurðar, O Lĭ′bă-nŏn, at eldurin má tæra tíni sedri*strø.*
2 Yl, *tú* aðalgranntræ; tí at sedris*træið* er fallið; av tí at teir mektigu eru rændir: ýlið, O tit Bá′-sjåns eikir; tí at víngarðsins skógur er komin niður.
3 ¶ Ein rødd *er* av ýlingini av hirðunum; tí at teirra dýrd er rænd: ein rødd av ýlingini av ungum leyvum; tí at stoltleiki Jordans er rændur.
4 Svá sigur HARRIN Guð mín; Føð fylgi slátranarinnar;
5 Hvørs ánarar vega tey, og halda seg sjálvar ikki sekar: og teir, sum selja tey, siga, Vælsignaður *veri* HARRIN; tí at eg eri ríkur: og teirra egnu hirðar várkunna teimum ikki.
6 Tí at eg vil ei meira várkunna íbúgvum landsins, sigur HARRIN: men sí, eg vil flýggja menninar hvønn *og* ēin inn í hondina á hansara næsta, og inn í hondina á hansara kongi: og teir skulu sláa landið, og út úr teirra hond vil eg ikki útfría *teir.*
7 Og eg vil føða fylgi slátranarinnar, *enntá* tykkum, O ørmu fylgisins. Og eg tók at mær tveir stavir; tann ēina kallaði eg Vakurleika, og hīn kallaði eg Bond; og eg føddi fylgið.
8 Tríggjar hirðar eisini skar eg av í ēinum mánaði; og sál mín vamlaðist við teir, og teirra sál eisini stóðst við meg.
9 Tá segði eg, Eg vil ikki føða tykkum: tað, sum doyr, lat tað doyggja; og tað, sum eigur at verða skorið av, lat tað verða skorið av; og lat restina eta hvør *og* ēin kjøtið á einum øðrum.
10 ¶ Og eg tók stav mín, *enntá* Vakurleika, og skar hann sundur, at eg mátti bróta mín sáttmála sum eg hevði gjørt við alt fólkið.

11 Og hann varð brotin í tí
degi: og so hinir ørmu av fylg-
inum, sum væntaðu eftir mær,
vitstu, at tað *var* orð HARRANS.
12 Og eg segði við teir, Um
tykkum tykir gott, gevið *mær*
prís mín; og um ikki, latið vera.
So teir vigaðu til mín prís tríati
stykkir av silvuri.
13 Og HARRIN segði við meg,
Kasta tað til pottamakaran: ein
stásiligur prísur, sum eg varð
prís*mett*ur til av teimum. Og eg
tók tey tríati *stykkini* av silvuri,
og kastaði tey til pottamakaran í
húsi HARRANS.
14 Tá skar eg sundur hīn stavin
hjá mær, *enntá* Bond, at eg mátti
bróta bróðurskapin ímillum Jud-
ah og Ísrael.
15 ¶ Og HARRIN segði við meg,
Tak til tín enn reiðskapirnar hjá
einum dársomum hirða.
16 Tí at sí, eg vil reisa upp ein
hirða í landinum, *sum* skal ikki
vitja teir ið veri *seg* skornir av,
eiheldur skal søkja hin unga, ella
grøða tað sum er brotið, ella føða
tað sum stendur stilt: men hann
skal eta kjøtið á teimum feitu, og
skræða teirra kleyvar í stykkir.
17 Vei avguds hirðanum, sum
fer frá fylginum! svørðið *skal*
vera uppiá hans armi, og uppiá
hans høgra eyga: hans armur
skal verða heilt turkaður upp, og
hans høgra eyga skal verða al-
deilis myrkjað.

KAPITUL 12

BYRÐI HARRANS orðs yvir
Ísrael, sigur HARRIN, sum
tenur út himnarnar, og leggur
grundvøll jarðarinnar, og myndar
anda mans innan í honum.
2 Sí, eg vil gera Jerusalem *til*
eitt nøtranar-bikar yvirfyri øll-
um fólkinum runt umkring, tá ið
teir skulu vera í kringsetingini
bæði ímóti Judah *og* ímóti Jeru-
salem.
3 ¶ Og á tí degi vil eg gera
Jerusalem *til* ein byrðisaman
stein fyri øllum fólki: allir, sum
byrða seg við honum, skulu verða
skornir í stykkir, tó *at* øll fólk
jarðarinnar verði savnaði saman
ímóti honum.
4 Í tí degi, sigur HARRIN, vil
eg sláa hvønn hest við ótan, og
reiðmann hansara við ørskapi:
og eg vil opna míni eygu uppá
Judah hús, og vil sláa hvønn hest
fólksins við blindleika.
5 Og landsstjórarnir av Judah
skulu siga í hjarta sínum, Jeru-
salems íbúgvar *skulu vera* mín
styrki í HARRA herliðanna Guði
sínum.
6 ¶ Í tí degi vil eg gera lands-
stjórarnar av Judah sum eina elds-
grúgvu millum viðarins, og sum
ein elds-fakkul í einum bundi; og
teir skulu upptæra alt fólkið runt
umkring, við hina høgru hond og
við hina vinstru: og Jerusalem
skal verða búð í aftur í sínum egna
plássi, *enntá* í Jerusalem.
7 HARRIN eisini skal frelsa
tjøldini av Judah fyrst, at dýrd-
in hjá húsi Dávids og dýrdin hjá
íbúgvum Jerusalems geri ikki *seg*
sjálvar stórar ímóti Judah.
8 Í tí degi skal HARRIN verja
íbúgvar Jerusalems; og hann, sum
er máttleysur teirra millum í tí degi,
skal vera sum Dávid; og Dávids
hús *skal vera* sum Guð, sum eingil
HARRANS frammi fyri teimum.
9 ¶ Og tað skal bera á í tí degi,
at eg vil søkja at oyða allar tjóðir-
nar sum koma ímóti Jerusalem.
10 Og eg vil hella uppá hús
Dávids, og uppá íbúgvar Jeru-
salems, náðar og umbøninga
andan: og teir skulu hyggja uppá
meg sum teir hava gatað, og teir
skulu harma um hann, eins og
ēin harmar yvir *hans* ēinasta *son,*
og skulu vera í beiskleika yvir
hann, eins og ēin sum er í beisk-
leika yvir *hansara* fyrstafødda.

11 Í tí degi skal tað verða ein mikil harman í Jerusalem, eins og harman Há-dăd-rīm′-mŏn-s í Mĕ-gĭd′-dŏn-s dali.
12 Og landið skal harma, hvør familja fyri seg; familja Dávids húss fyri seg, og teirra konur fyri seg; familja Náthans húss fyri seg, og teirra konur fyri seg;
13 Familja Levīs húss fyri seg, og teirra konur fyri seg; familja Sjīm′-ĕ-ī-s húss fyri seg, og teirra konur fyri seg;
14 Allar familjurnar sum eru eftir, hvør familja fyri seg, og teirra konur fyri seg.

KAPITUL 13

Í TÍ degi skal vera ein kelda opnað fyri húsi Dávids og fyri íbúgvum Jerusalems fyri synd og fyri óreinsku.
2 ¶ Og tað skal bera á í tí degi, sigur HARRI herliðanna, *at* eg vil skera av nøvnini á hjágudunum út úr landinum, og teir skulu ei meira verða mintir: og eisini vil eg elva prophetunum og óreina andanum at fara út úr landinum.
3 Og tað skal bera á, *at* tá ið nakar skal enn propheterа, tá skulu hansara faðir og hansara móðir, sum gótu hann, siga við hann, Tú skalt ikki liva; tí at tú talart lygnir í navni HARRANS: og faðir hansara og móðir hansara, sum gótu hann, skulu stoyta hann ígjøgn, tá ið hann propheterar.
4 Og tað skal bera á í tí degi, *at* prophetarnir skulu skammast, hvør *og* ēin um sjón sína, tá ið hann hevur propheterað; eiheldur skulu teir vera í einum ruskutum klæði til at teipa:
5 Men hann skal siga, Eg *eri* eingin prophetur, eg *eri* ein jarðyrkismaður; tí at maður lærdi meg at passa fenað frá mínum ungdómi.
6 Og *ēin* skal siga við hann, Hvat *eru* hesi sárini í hondum tínum? Tá skal hann svara, *Tey*, hvarvið eg varð særdur *í* húsi vina mína.
7 ¶ Vakna, O svørð, ímóti hirða mínum, og ímóti manninum *sum er* felagi mín, sigur HARRI herliðanna: slá hirðan, og seyðirnir skulu verða spjaddir: og eg vil venda míni hond uppá hinar smáu.
8 Og tað skal bera á, *at* í øllum landinum, sigur HARRIN, skulu tveir partar í tí verða skornir av *og* doyggja, men hin triðji skal verða eftirlatin harí.
9 Og eg vil føra triðjapartin ígjøgnum eldin, og vil edla teir sum silvur verður edlað, og vil royna teir sum gull verður roynt: teir skulu kalla á navn mítt, og eg vil hoyra teir: eg vil siga, Tað *er* fólk mítt: og teir skulu siga, HARRIN *er* Guð mín.

KAPITUL 14

SÍ, dagur HARRANS kemur, og tín herfongur skal verða skiftur í miðjum tær.
2 Tí at eg vil savna allar tjóðir ímóti Jerusalem til bardaga; og staðurin skal verða tikin, og húsini herjaði, og kvinnurnar neyðtiknar; og helmingur av staðinum skal fara fram inn í fangaskap, og hitt eftirverandi av fólkinum skal ikki verða skorið av frá staðinum.
3 Tá skal HARRIN fara fram, og berjast ímóti teimum tjóðunum, eins og tá ið hann bardist á bardagadeginum.
4 ¶ Og hansara føtur skulu standa í tí degi uppiá Olivinfjallinum, sum *er* frammanfyri Jerusalem eystanfyri, og Olivinfjallið skal klovna í miðju tess ímóti eysturi og ímóti vesturi, *og har skal verða* ein sera mikil dalur; og helmingur av fjallinum skal burtflyta ímóti norðuri, og helmingur av tí ímóti suðuri.
5 Og tit skulu flýggja *til* fjalladalin; tí at fjalladalurin skal røkka

at Ā′zăl: ja, tit skulu flýggja, líka sum tit flýddu frá fyri framman jarðskjálvtanum á døgum Ūz′zĭăh kongs av Judah: og HARRIN Guð mín skal koma, *og* allir hinir heilagu við tær.

6 Og tað skal bera á í tí degi, *at* ljósið skal ei vera klárt, *ella* myrkt:

7 Men tað skal vera ēin dagur sum skal vera kunnugur fyri HARRANUM, ikki dagur, ella nátt: men tað skal bera á, *at* á kvøldartíð skal tað vera ljóst.

8 Og tað skal verða í tí degi, *at* livandi vøtn skulu fara út frá Jerusalem; helmingur av teimum ímóti hinum fyrra sjógvi, og helmingur av teimum ímóti hinum handara sjógvi: á sumri og á vetri skal tað vera.

9 Og HARRIN skal vera kongur yvir allari jørðini: í tí degi skal tað vera ēin HARRI, og navn hans ēitt.

10 Alt landið skal verða skift sum ein slætti frá Gē′bă til Rĭm′mōn sunnan fyri Jerusalem: og tað skal verða lyft upp, og búð í á plássi sínum, frá Benjamins-portri at plássi hins fyrsta porturs, at hjørna-portrinum, og *frá* Hăn′ănēēl-s torni at vínpersum kongs.

11 Og *menn* skulu búgva í tí, og har skal vera eingin meira aldeilis oyðing; men Jerusalem skal vera tryggliga búð í.

12 ¶ Og hetta skal vera plágan, hvarvið HARRIN vil sláa øll fólkini sum hava barst ímóti Jerusalem; Teirra kjøt skal tærast burtur meðan teir standa uppiá sínum fótum, og teirra eygu skulu tærast burtur í teirra holum, og teirra tunga skal tærast burtur í teirra munni.

13 Og tað skal bera á í tí degi, *at* ein mikil hávi frá HARRANUM skal vera teirra millum; og teir skulu leggja hald hvør *og* ēin á hond næsta síns, og hansara hond skal rísa upp ímóti hond næsta hansara.

14 Og Judah eisini skal berjast í Jerusalem; og ríkidømið hjá øllum teimum heidnu runt umkring skal verða savnað saman, gull, og silvur, og skartaklædnaður, í miklum ríkiligleika.

15 Og soleiðis skal vera plágan hjá hestinum, hjá múldjórinum, hjá kamelinum, og hjá asnanum, og hjá øllum djórunum sum skulu vera í hesum tjøldum, eins og henda plágan.

16 ¶ Og tað skal bera á, *at* hvør tann sum er eftir av øllum teimum tjóðunum sum komu ímóti Jerusalem, skal enntá fara niðan frá ári til árs at tilbiðja Kongin, HARRA herliðanna, og at halda tabernakla-hátíðina.

17 Og tað skal bera á, *at* hvør*iðso* vil ikki koma niðan av *øllum* familjum jarðarinnar til Jerusalem at tilbiðja Kongin, HARRA herliðanna, enntá uppá teir skal einkið regn vera.

18 Og um familja Egyptalands fari ikki niðan, og komi ikki, sum einkið *regn hava; tá* skal har vera plágan, hvarvið HARRIN vil sláa hinar heidnu sum koma ikki niðan at halda tabernakla-hátíðina.

19 Hendan skal vera revsingin hjá Egyptalandi, og revsingin hjá øllum tjóðum sum koma ikki niðan at halda tabernakla-hátíðina.

20 ¶ Í tí degi skal tað vera uppiá bjøllunum hjá hestunum, HEILAGLEIKI AT HARRANUM; og pottarnir í húsi HARRANS skulu vera sum bollarnir frammanfyri altarinum.

21 Ja, hvør pottur í Jerusalem og í Judah skal vera heilagleiki at HARRA herliðanna: og allir teir, sum sláturofra, skulu koma og taka av teimum, og sjóða harí: og í tí degi skal vera ei meira Cănaanitin í húsi HARRA herliðanna.

MALACHI.

KAPITUL 1

BYRÐI HARRANS orðs til Ísraels við ̂ Mal´-ă-chī.

2 Eg havi elskað tykkum, sigur HARRIN. Tó siga tit, Hvarí hevurt tú elskað okkum? *Var* ikki Esav bróðir Jákobs? sigur HARRIN: eg tó elskaði Jákob,

3 Og eg hataði Esav, og legði hansara fjøll og hans arvalut *í* oyði fyri drekar oyðunnar.

4 Hvar ið Ē´-dóm sigur, Vit eru útarmaðir, men vit vilja venda aftur og byggja hini oydnu pláss; svá sigur HARRI herliðanna, Teir skulu byggja, men eg vil tveita niður; og teir skulu kalla teir, Vondskunnar landamark, og, Tað fólk, ímóti hvørjum HARRIN hevur harmavreiði um ævir.

5 Og tykkar eygu skulu sjá, og tit skulu siga, HARRIN vil verða stórgjørdur frá landamarki Ísraels.

6 ¶ Ein sonur ærir faðir *sín,* og ein tænari sín meistara: um tá eg *veri meg* ein faðir, hvar *er* æra mín? og um eg *veri meg* ein meistari, hvar *er* ótti mín? sigur HARRI herliðanna við tykkum, O prestar, sum vanvirða mítt navn. Og tit siga, Hvarí hava vit vanvirt títt navn?

7 Tit ofra óreinkað breyð uppiá mínum altari; og tit siga, Hvarí hava vit óreinkað teg? Í at tit siga, HARRANS borð *er* vanvirðisligt.

8 Og um tit ofri hitt blinda fyri offur, *er tað* ikki ilt? og um tit ofri hitt lamna og sjúka, *er tað* ikki ilt? ofra tað nú at landsstjóra tínum; vil hann vera toknaður við teg, ella góðtaka tín persón? sigur HARRI herliðanna.

9 Og nú, eg biði tykkum, bønið Guð, at hann vilji vera náðisamur at okkum: hetta hevur verið við ̂ tykkara midlum: vil hann geva far eftir persónum tykkara? sigur HARRI herliðanna.

10 Hvør *er tað* enntá tykkara millum, sum vildi latið aftur dyrnar *til einkiðs?* eiheldur kynda tit *eld* á mínum altari til einkiðs. Eg havi onga fragd í tykkum, sigur HARRI herliðanna, eiheldur vil eg taka við einum ofri av tykkara hond.

11 Tí at frá rísing sólarinnar alt at niðurfaringini av hini somu, *skal* navn mítt *vera* mikið Heidninganna millum; og í hvørjum plássi *skal* roykilsi *verða* ofrað at navni mínum, og eitt skírt offur: tí at navn mítt *skal vera* mikið hinna heidnu millum, sigur HARRI herliðanna.

12 ¶ Men tit hava halgispottað tað, í at tit siga, HARRANS borð *er* óreinkað; og ávøkstur tess, *enntá* hansara matur, *er* vanvirðisligur.

13 Tit søgdu eisini, Sí, hvat ein møðsemi *tað er!* og tit hava snúsað eftir tí, sigur HARRI herliðanna; og tit førdu *tað sum var* skrætt, og hitt lamna, og hitt sjúka, soleiðis førdu tit eitt offur: skuldi eg góðtikið hetta av tykkara hond? sigur HARRIN.

14 Men bannaður *veri* teiparin, sum hevur í sínum fylgi ein hann, og streingir heiti, og sláturofrar at Harranum eitt spilt ting: tí at eg *eri* ein mikil Kongur, sigur HARRI herliðanna, og navn mítt *er* øtiligt hinna heidnu millum.

KAPITUL 2

OG nú, O tit prestar, hetta boð *er* til tykkara.

2 Um tit vilji ikki hoyra, og um tit vilji ikki leggja *tað* á hjarta, at geva dýrd at navni mínum, sigur HARRI herliðanna, vil eg enntá senda eina banning uppá tykkum, og eg vil banna tykkara signingar: ja, eg havi bannað tær longu, av tí at tit leggja *tað* ikki á hjarta.

3 Sí, eg vil spilla tykkara sáð, og breiða trekk omanyvir tykkar andlit˘, *enntá* trekkin av tykkara hátíðar-festum; og *ēin* skal taka tykkum burtur við honum.

4 Og tit skulu vita, at eg havi sent hetta boð til tykkara, at mín sáttmáli mátti vera við Levī, sigur HARRI herliðanna.

5 Mín sáttmáli var við hann av livi og friði; og eg gav tey til hansara *fyri* óttan, hvarvið hann óttaðist meg; og var ræddur frammi fyri navni mínum.

6 Sannleikans lóg var í hansara munni, og misgerð fanst ikki í hansara varrum: hann gekk við mær í friði og rættferð, og vendi mongum burtur frá misgerð.

7 Tí at prestsins varrar skuldu varðveita kunnleika, og teir skuldu søkja lógina av hansara munni: tí at hann *er* sendiboð HARRA herliðanna.

8 Men tit eru viknir út av veginum; tit hava volt mongum at snáva fyri lógini; tit hava spilt sáttmála Levīs, sigur HARRI herliðanna.

9 Tí havi eg eisini gjørt tykkum vanvirðisligar og niðarligar frammi fyri øllum fólkinum, samsvarandi sum tit hava ikki hildið vegir mínar, men hava verið partískir í lógini.

10 Hava vit ikki allir ēin faðir? hevur ikki ēin Guð skapt okkum? hví handla vit svikræðisligani hvør maður ímóti bróður sínum, við at halgispotta sáttmála fedra vára?

11 ¶ Judah hevur handlað svikræðisligani, og ein andstygd er framd í Ísrael og í Jerusalem; tí at Judah hevur halgispottað heilagleika HARRANS sum hann elskaði, og hevur gift *seg* við dóttrini at einum fremmandum gudi.

12 HARRIN vil avskera tann mann sum hetta ger, meistaran og hin lærda, úr tabernaklum Jákobs, og hann sum ofrar eitt offur at HARRA herliðanna.

13 Og hetta hava tit gjørt aftur, hyljandi HARRANS altar við tárum, við gráti, og við at geyla út, so mikið at hann gevur ikki far um ofrið meira, ella tekur ímóti *tí* við góðum vilja av tykkara hond.

14 ¶ Tó siga tit, Hvørsvegna? Av tí at HARRIN hevur verið vitni ímillum teg og vív ungdóms tíns, ímóti hvørji tú hevurt handlað svikræðisligani: tó *er* hon felagi tín, og vív sáttmála tíns.

15 Og gjørdi hann ikki *til* ēitt? Tó hevur hann hitt eftirverandi av andanum. Og hvørsvegna ēitt? At hann mátti søkja eitt gudligt sáð. Tessvegna gevið far um anda tykkara, og lat ongan handla svikræðisligani ímóti vívi ungdóms síns.

16 Tí at HARRIN, Guð Ísraels, sigur, at hann hatar *tað* at koyra burtur: tí at *ēin* hylur harðskap við klæði sínum, sigur HARRI herliðanna: tessvegna gevið far um anda tykkara, at tit handli ikki svikræðisliga.

17 ¶ Tit hava troyttað HARRAN við orðum tykkara. Tó siga tit, Í hvørjum hava vit troyttað *hann?* Tá ið tit siga, Hvør tann, sum ger ilt, *er* góður í eygsjón HARRANS, og hann fragdast í teimum; ella, Hvar *er* dómsins Guð?

KAPITUL 3

SÍ, eg vil senda mín sendiboða, og hann skal fyribúgva vegin undan mær: og Harrin, hvønn tit søkja, skal brádligani koma til tempuls síns, enntá sendiboð sáttmálans, hvørjum tit fragdast í: sí, hann skal koma, sigur HARRI herliðanna.

2 Men hvør kann verða *verandi* dagin av hansara komu? og hvør skal standast, tá ið hann birtist? tí at hann *er* eins og eldur hjá einum edlara, og líka *sum* sápa hjá *klædna*reinsarum:

3 Og hann skal sita *sum* ein
edlari og skírgari av silvuri: og
hann skal skírga synir Levīs, og
reinska teir sum gull og silvur, at
teir mega ofra at HARRANUM eitt
offur í rættvísi.
4 Tá skal ofrið hjá Judah og
Jerusalem vera dámligt at HARRA-
NUM, sum í døgunum í forðum,
og sum í fyrri árum.
5 Og eg vil koma nær til tykkara
til dóms; og eg vil vera eitt snar-
ligt vitni ímóti galdramonnunum,
og ímóti hordómsfremjarunum,
og ímóti følskum svørjarum, og
ímóti teimum sum kúga leigu-
sveinin í løn *hansara,* einkjuna,
og hin faðirleysa, og sum venda
til viks hin fremmanda *frá rætti
hansara,* og óttast ikki meg, sigur
HARRI herliðanna.
6 Tí at eg *eri* HARRIN, eg broyt-
ist ikki; tessvegna tit synir Jákobs
eru ikki upptærdir.
7 ¶ Enntá frá døgum fedra
tykkara eru tit farnir burtur frá
mínum regluskipanum, og hava
ikki hildið *tær.* Vendið aftur at
mær, og eg vil venda aftur at
tykkum, sigur HARRI herliðanna.
Men tit søgdu, Í hvørjum skulu
vit venda aftur?
8 ¶ Vil ein maður ræna Guð?
Tó hava tit rænt meg. Men tit
siga, Í hvørjum hava vit rænt teg?
Í tíggjundum og ofrum.
9 Tit *eru* bannaðir við eini
banning: tí at tit hava rænt meg,
enntá øll henda tjóð.
10 Berið tit allar tíggjundir-
nar inn í goymsluhúsið, at vera
má matur í húsi mínum, og roynið
meg nú hervið, sigur HARRI
herliðanna, um eg vil ikki opna
tykkum gluggar himins, og hella
tykkum út eina signing, at *tað
skal* ikki *vera rúm* nokk *at taka
við tí.*
11 Og eg vil harta tæraran fyri
tykkara sakir, og hann skal ikki
oyðileggja ávøkstir jarðar tykkara;
eiheldur skal tykkara víntræ kasta
sín ávøkst áðrenn tíðina í akr-
inum, sigur HARRI herliðanna.
12 Og allar tjóðir skulu kalla
tykkum signaðar: tí at tit skulu
vera eitt fragdsamt land, sigur
HARRI herliðanna.
13 ¶ Tykkara orð hava verið
hørð ímóti mær, sigur HARRIN.
Tó siga tit, Hvat hava vit talað *so
mikið* ímóti tær?
14 Tit hava sagt, Tað *er* fáfongt
at tæna Guði: og hvat gagn *er
tað,* at vit hava hildið hansara
regluskipan, og at vit hava gingið
harmfulsligani frammi fyri HARRA
herliðanna?
15 Og nú kalla vit hinar hug-
móðigu sælar; ja, teir, sum virka
vondsku, eru settir upp; ja, *teir,
sum* freista Guð, eru enntá út-
fríaðir.
16 ¶ Tá talaðu teir, sum óttað-
ust HARRAN, ofta hvør til annan:
og HARRIN gav gætur, og hoyrdi
tað, og ein endurminningar-bók
varð skrivað frammi fyri honum
fyri teir sum óttast HARRAN, og
sum hugsaðu um navn hansara.
17 Og teir skulu vera mínir,
sigur HARRI herliðanna, í tí degi
tá ið eg geri til mínar gimstein-
ar; og eg vil eira teimum, sum
ein maður eirir sínum egna syni
sum tænir honum.
18 Tá skulu tit venda aftur,
og greina ímillum hin rættvísa
og hin vonda; ímillum hann sum
tænir Guði, og hann sum tænir
honum ikki.

KAPITUL 4

TÍ at sí, dagurin kemur, sum
skal brenna sum ein ovn-
ur; og allir hinir hugmóðigu, ja,
og allir sum gera vondliga, skulu
vera hálmur: og dagurin, sum
kemur, skal brenna teir upp, sigur
HARRI herliðanna, at hann skal
eftirlata teimum hvørki rót ella
grein.

2 ¶ Men innat tykkum, sum óttast mítt navn, skal rættvísis Sólin reisast við grøðing í hansara veingjum; og tit skulu fara fram, og vaksa upp sum kálvar úr stallinum.


3 Og tit skulu traðka niður hinar vondu; tí at teir skulu vera øskur undir iljunum á tykkara fótum í tí degi sum eg skal gera *hetta,* sigur HARRI herliðanna.

4 ¶ Minnist tit lóg Mósesar, tænara míns, hvørja eg bjóðaði honum á Hór´-ēb fyri allan Ísrael, *við* ásetingunum og dómunum.

5 ¶ Sí, eg vil senda tykkum Ê-lī´-jăh prophet undan komu hins mikla og ótiliga dags HARRANS:

6 Og hann skal venda hjarta fedranna til barnanna, og hjarta barnanna til fedra teirra, at ikki eg komi og slái jørðina við eini banning.

ENDI PROPHETANNA.



HITT NÝGGJA TESTAMENTI

VÁRS

HARRA

OG

FRELSARA

JESU

CHRISTS.

ANNO DOMINI 2015.

EVANGELIIÐ SAMBÆRT
ST. MATTHÆUSI.

KAPITUL 1

ÆTTARBÓK Jesu Christs, sonar Dávids, sonar Ábrahams.

2 Ábraham gat Ísaak; og Ísaakur gat Jákob; og Jákob gat Judas og brøður hansara;

3 Og Judas gat Phár´ës og Zár´ă av Thá´mâr; og Phár´ës gat Ës´rŏm; og Ës´rŏm gat Ár´ăm;

4 Og Ár´ăm gat Ă-mĭn´ă-dăb; og Ă-mĭn´ă-dăb gat Ná-ăs´sŏn; og Ná-ăs´sŏn gat Săl´mŏn;

5 Og Săl´mŏn gat Bó´ŏz av Rá´chab; og Bó´ŏz gat Ó´bĕd av Ruth; og Ó´bĕd gat Ísai;

6 Og Ísai gat Dávid kong; og Dávid kongur gat Sálomon av henni *sum hevði verið kona* Ú´rĭ-ăs-ar;

7 Og Sálomon gat Ró´bŏ-ăm; og Ró´bŏ-ăm gat Á´bĭ-ă, og Á´bĭ-ă gat Á´să;

8 Og Á´să gat Jó´să-phăt; og Jó´să-phăt gat Jóram; og Jóram gat Ó´zĭ-ăs;

9 Og Ó´zĭ-ăs gat Jó´ă-thăm; og Jó´ă-thăm gat Á´chăz; og Á´chăz gat Ēz-ē-kī´ăs;

10 Og Ēz-ē-kī´ăs gat Mă-năs´sēs; og Mă-năs´sēs gat Ámon; og Ámon gat Jó´sĭ-ăs;

11 Og Jó´sĭ-ăs gat Jĕch-ô-nī´ăs og brøður hans, um tað mundið teir vórðu bornir burtur til Bábylon:

12 Og eftir *at* teir vóru førdir til Bábylon, gat Jĕch-ô-nī´ăs Să-lá´thĭ-ĕl; og Să-lá´thĭ-ĕl gat Zô-rô-bá´bĕl;

13 Og Zô-rô-bá´bĕl gat Á´bĭ-ŭd; og Á´bĭ-ŭd gat Ē´lĭ-ă-kĭm; og Ē´lĭ-ă-kĭm gat Ā´zôr;

14 Og Ā´zôr gat Să´dŏc; og Să´dŏc gat Á´chĭm; og Á´chĭm gat Ē´lĭ-ŭd;

15 Og Ē´lĭ-ŭd gat Ĕl-ē-ā´zâr; og Ĕl-ē-ā´zâr gat Măt´thăn; og Măt´thăn gat Jákob;

16 Og Jákob gat Joseph, mann Mariu, av hvørji varð føddur Jesus, sum er kallaður Christus.

17 So *at* allir ættarliðirnir frá Ábrahami til Dávids *eru* fjúrtan ættarliðir; og frá Dávidi inntil burturberingina inn í Bábylon *eru* fjúrtan ættarliðir; og frá burturberingini inn í Bábylon at Christi *eru* fjúrtan ættarliðir.

18 ¶ Nú, føðing Jesu Christs var á hesa vís: Tá ið sum móðir hansara, Maria, var trúlovað Josephi, áður enn tey komu saman, varð hon funnin við barn av Halga Andanum.

19 Tá varð Joseph, maður hennara, *sum* var ein rættvísur *maður,* og ikki viljugur at gera hana *til* eitt alment fyridømi, hugaður at koyra hana burtur loyniligani.

20 Men meðan hann grundaði um hesar lutir, sí, eingil Harrans birtist honum í dreymi, sigandi, Joseph, tú sonur Dávids, óttast ikki at taka til tín Mariu, konu tína: tí at tað, sum er gitið í henni, er av Halga Andanum.

21 Og hon skal bera fram ein son, og tú skalt kalla navn hansara JESUS: tí at hann skal frelsa fólk sítt frá syndum teirra.

22 Nú, alt hetta varð gjørt, at tað mátti verða uppfylt, sum varð talað av Harranum við prophetinum, sigandi,

23 Sí, ein jomfrú skal verða við barn, og skal bera fram ein son, og navn hansara skulu tey kalla Ĭm-măn´ú-ĕl, sum, verðandi týtt, er, Guð við okkum.

24 Joseph, verandi reistur frá svøvni, tá gjørdi eins og eingil Harrans hevði boðið honum, og tók til sín konu sína:

25 Og kendi hana ikki, fyrrenn hon hevði borið fram sín fyrstafødda son: og hann kallaði navn hansara JESUS.

KAPITUL 2

NÚ, tá ið Jesus varð føddur í Bethlehem Judæu á døgum Heródesar kongs, sí, *tá* komu vísmenn úr eystri til Jerusalem,

2 Sigandi, Hvar er hann, sum er føddur Kongur Jødanna? tí at vit hava sæð hansara stjørnu í eystri, og eru komnir at tilbiðja hann.

3 Tá ið Heródes kongur hevði hoyrt *hesi ting*, varð hann órógvaður, og alt Jerusalem við honum.

4 Og tá ið hann hevði savnað allar teir fremstu prestarnar og skriftlærdu av fólkinum saman, kravdi hann av teimum, hvar Christus skuldi verða føddur.

5 Og teir søgdu við hann, Í Bethlehem Judæu: tí at soleiðis stendur skrivað við^ prophetinum,

6 Og tú, Bethlehem, *í* landi Juda, ert ikki hin minsti millum Juda prinsa: tí út úr tær skal koma ein Stjórnari, sum skal stjórna fólki mínum Ísrael.

7 Heródes, tá ið hann loyniliga hevði kallað vísmenninar, tá fregnaðist dúgligani av teimum, hvørja tíð stjørnan birtist.

8 Og hann sendi teir til Bethlehem, og segði, Farið og sóknist dúgligani eftir tí unga barninum; og tá ið tit hava funnið *hann,* berið mær orð aftur, at eg má koma og tilbiðja hann eisini.

9 Tá ið teir høvdu hoyrt kongin, fóru teir avstað; og sí, stjørnan, sum teir sóu í eystri, fór undan teimum, til hon kom og stóð har tað unga barnið var.

10 Tá ið teir sóu stjørnuna, fegnaðust teir við avbera miklum fagnaði.

11 ¶ Og tá ið teir vóru komnir inn í húsið, sóu teir tað unga barnið hjá Mariu, móður hansara, og fullu niður, og tilbóðu hann: og tá ið teir høvdu opnað skattir sínar, framsettu teir at honum gávur; gull, og roykilsi, og myrrhu.

12 Og, verðandi ávaraðir av Guði í einum dreymi, at teir skuldu ikki fara aftur til Heródesar, hildu teir avstað inn í sítt egna land ein annan veg.

13 Og tá ið teir vóru farnir avstað, sí, eingil Harrans birtist fyri Jósephi í einum dreymi, sigandi, Reis *teg*, og tak tað unga barnið og móður hansara, og flýggja inn í Egyptaland, og verð tú har, til eg beri tær orð: tí at Heródes vil leita eftir tí unga barninum til *tess* at oyða hann.

14 Tá ið hann reistist, tók hann tað unga barnið og móður hansara um nátt*ina,* og fór avstað inn í Egyptaland:

15 Og varð har inntil deyða Heródesar: at tað mátti verða uppfylt, sum varð talað av Harranum við^ prophetinum, sigandi, Út úr Egyptalandi havi eg kallað son mín.

16 ¶ Heródes, tá ið hann sá at hann var háðaður av vísmonnunum, varð tá avbera vreiður, og sendi út, og drap øll børnini sum vóru í Bethlehem, og í øllum breddum tess, frá tvey ára gomlum og undir, samsvarandi við tíðina sum hann hevði dúgliga fregnað av vísmonnunum.

17 Tá varð uppfylt tað, sum talað varð við^ Jeremiasi prophéti, sigandi,

18 Í Rá·má varð ein rødd hoyrd, harman, og grátur, og mikil syrgjan, Rachel grátandi *vegna* barna sína, og vildi ikki verða uggað, av tí at tey eru ei.

19 ¶ Men tá ið Heródes var deyður, sí, ein eingil Harrans birtist í einum dreymi fyri Jósephi í Egyptalandi,

20 Sigandi, Reis *teg,* og tak tað unga barnið og móður hansara,

og far inn í land Ísraels: tí at teir eru deyðir sum søktu lív unga barnsins.

21 Og hann reistist, og tók tað unga barnið og móður hansara, og kom inn í land Ísraels.

22 Men tá ið hann hoyrdi, at Ár-chĕ-lā´-ŭs ráddi í Judæu í rúmi faðirs hansara Heródesar, óttaðist hann at fara hagar: hóast hetta, verðandi ávaraður av Guði í einum dreymi, vendi hann til viks inn í *lands*partarnar av Galilēu:

23 Og hann kom og dvaldist í einum staði, kallaðum Nazareth: at tað mátti verða uppfylt, sum varð talað viðˆ prophetunum, Hann skal verða kallaður ein Nazarēari.

KAPITUL 3

Í TEIMUM døgum kom Jóhannes Doyparin, prædikandi í oyðuni av Judæu,

2 Og sigandi, Vendið tit um: tí at kongadømi himins er fyri hond.

3 Tí at hesin er hann, sum varð talaður um av prophetinum Ê-saĭ´-ăs-i, sigandi, Røddin á ēinum, rópandi í oyðimørkini, Fyribúgvið tit veg Harrans, gerið gøtur hansara beinar.

4 Og hin sami Jóhannes hevði sín klædnað av kamelhári, og ein leður gyrðil um lendar sínar; og hansara matur var grashoppur og villur hunangur.

5 Tá fóru út til hansara Jerusalem, og alt Judæa, og alt umráðið rundan um Jordan,

6 Og vórðu doypt av honum í Jordan, játtandi syndum sínum.

7 ¶ Men tá ið hann sá mangar av Pharisēarunum og Săd-dû-cēē´-arunum koma til dóps síns, segði hann við teir, O avkom av eiturormum, hvør hevur ávarað tykkum at flýggja frá hini komandi vreiðini?

8 Berið fram tessvegna ávøkstir, hóskiligir fyri umvending:

9 Og hugsið ikki at siga innan í tykkum sjálvum, Vit hava Ábraham til faðir *okkara:* tí at eg sigi tykkum, at Guð er førur fyri av hesum steinum at reisa upp børn at Ábrahami.

10 Og nú eisini er øksin løgd at rótini á trøunum: tessvegna hvørt træ, sum ber ikki fram góðan ávøkst, verður høgt niður, og kastað inn í eldin.

11 Eg víst doypi tykkum við vatni til umvendingar: men hann, sum kemur eftir meg, er mektigari enn eg, hvørs skógvar eg eri ikki verdigur at bera: hann skal doypa tykkum við Halga Andanum, og *við* eldi:

12 Hvørs kastiskuvla *er* í hond hansara, og hann vil dyggiliga reinska gólv sítt, og savna hveiti sítt inn í løðuna; men hann vil brenna upp dumbuna við ósløkkiligum eldi.

13 ¶ Tá kemur Jesus frá Galilēu til Jordan til Jóhannesar, at verða doyptur av honum.

14 Men Jóhannes sýtti honum, sigandi, Eg havi tørv *á* at verða doyptur av tær, og kemurt tú til mín?

15 Og svarandi segði Jesus við hann, Loyv *tí at vera so* nú: tí at svá sømir tað okkum at uppfylla alla rættvísi. Tá loyvdi hann honum.

16 Og Jesus, tá ið hann var doyptur, fór upp beinanvegin út úr vatninum: og sí, himnarnir vórðu opnaðir honum, og hann sá Guðs Anda stígandi niður líkasum ein dúgva, og lendandi uppiá honum:

17 Og sí ein rødd frá himni, sigandi, Hesin er mín háttelskaði Sonur, í hvørjum eg eri væl toknaður.

KAPITUL 4

TÁ varð Jesus leiddur niðan av Andanum inn í oyðuna, at verða freistaður av djevlinum.

2 Og tá ið hann hevði fastað fjøruti dagar og fjøruti nætur, varð hann aftaná ein hungraður.
3 Og tá ið freistarin kom til hansara, segði hann, Um tú veri Sonur Guðs, bjóða, at hesir steinar verði gjørdir breyð.
4 Men hann svaraði og segði, Skrivað stendur, Maður skal ikki liva av breyði eina, men av hvørjum orði sum útgongur út úr munni Guðs.
5 Tá tekur djevulin hann niðan í hin heilaga staðin, og setur hann á eitt torn tempulsins,
6 Og sigur við hann, Um tú veri Sonur Guðs, kasta teg sjálvan niður: tí at skrivað stendur, Hann skal geva einglum sínum álegging viðvíkjandi tær: og í *sínum* hondum skulu teir bera teg uppi, at ikki á nakrari tíð tú slái tín fót ímóti einum steini.
7 Jesus segði við hann, Aftur stendur skrivað, Tú skalt ikki freista Harran Guð tín.
8 Aftur tekur djevulin hann niðan á eitt ovurhonds høgt fjall, og sýnir honum øll kongadømir heimsins, og dýrd teirra;
9 Og sigur við hann, Øll hesi ting vil eg geva tær, um tú vilt falla niður og tilbiðja meg.
10 Tá sigur Jesus við hann, Slepp tær hiðani, Satan: tí at skrivað stendur, Tú skalt tilbiðja Harran Guð tín, og honum eina skalt tú tæna.
11 Tá fer djevulin frá honum, og sí, einglar komu og tæntu honum.
12 ¶ Nú, tá ið Jesus hevði hoyrt, at Jóhannes var kastaður inn í fongsul, fór hann avstað inn í Galilēu;
13 Og, farandi úr Nazareth, kom hann og dvaldist í Că-pĕr´-nă-ŭm, sum er á sævarstrondini, við mørk Zā´-bû-lŏn-s og Nĕp<u>h</u>´-thă-lĭm-s:
14 At tað mátti verða uppfylt, sum varð talað við^ Ê-saĭ´-ăs-i prophe<u>t</u>i, sigandi,
15 Land Zā´-bû-lŏn-s, og land Nĕp<u>h</u>´-thă-lĭm-s, *við* sævarvegin, hīnumegin Jordan, Galilēa Heidninganna;
16 Fólkið, sum sat í myrkri, sá mikið ljós; og fyri teimum, sum sótu í umráði og skugga deyðans, er ljós runnið upp.
17 ¶ Frá tí tíðini byrjaði Jesus at prædika, og at siga, Vendið um: tí at kongadømi himins er fyri hond.
18 ¶ Og Jesus, gangandi við Galilēu-sjógvin, sá tveir brøður, Símun — kallaður Pætur, og Andreas — bróður hansara, kastandi eitt garn inn í sjógvin: tí at teir vóru fiskarar.
19 Og hann sigur við teir, Fylgið mær, og eg vil gera tykkum mannafiskarar.
20 Og teir fóru beinanvegin frá gørnum *sínum,* og fylgdu honum.
21 Og, farandi áfram haðani, sá hann tveir aðrar brøður, Jákob, *son* Zĕb-ĕ-dēē´-ŭs-ar, og Jóhannes, bróður hansara, í einum báti við Zĕb-ĕ-dēē´-ŭs-i, faðir sínum, bøtandi gørn síni; og hann kallaði teir.
22 Og í stundini fóru teir frá bátinum og faðir sínum, og fylgdu honum.
23 ¶ Og Jesus fór um alt Galilēa, frálærandi í sýnagogum teirra, og prædikandi gleðiboðskap kongadømisins, og grøðandi øll sløg av sjúku og øll sløg av ilsku millum fólksins.
24 Og hansara giti fór út gjøgnum alla Sýriu: og tey førdu til hansara øll sjúk fólk sum vóru tikin við ymsum sjúkdómum og líðingum, og tey sum vóru heltikin við djevlum, og tey sum vóru mánasjúk, og tey sum høvdu lamningin; og hann grøddi tey.
25 Og tað fylgdu honum miklar fjøldir av fólki úr Galilēu, og *úr* Dê-câ-pō´-lĭs, og *úr* Jerusalem, og *úr* Judæu, og *frá* handan Jordan.

KAPITUL 5

OG, síggjandi mannfjøldirnar, fór hann niðan á eitt fjall: og tá ið hann var setstur, komu hansara lærusveinar til hansara:

2 Og hann læt upp munn sín, og lærdi teir, sigandi,

3 Vælsignað *eru* tey fátøku í anda: tí at teirra er kongadømi himins.

4 Vælsignað *eru* tey, ið syrgja: tí at tey skulu verða uggað.

5 Vælsignað *eru* tey eyðmjúku: tí at tey skulu arva jørðina.

6 Vælsignað *eru* tey, ið hungra og tyrsta eftir rættvísi: tí at tey skulu verða mettað.

7 Vælsignað *eru* tey miskunnsomu: tí at teimum skal lutast miskunn.

8 Vælsignað *eru* tey reinu í hjarta: tí at tey skulu síggja Guð.

9 Vælsignað *eru* tey, *ið* fáa frið í lag: tí at tey skulu verða kallað børn Guðs.

10 Vælsignað *eru* tey, ið verða atsøkt fyri rættvísis skuld: tí at teirra er kongadømi himins.

11 Vælsignað eru tit, tá ið *menn* skulu útskelda tykkum, og atsøkja *tykkum,* og skulu siga alt slag av illskapi ímóti tykkum falsliga, fyri mína skyld.

12 Fegnist, og verið avbera glað: tí at mikið *er* endurgjald tykkara í himni: tí at soleiðis søktu teir at prophetunum sum vóru undan tykkum.

13 ¶ Tit eru salt jarðarinnar: men um saltið havi mist smakk sín, við hvørjum skal tað verða saltað? tað er hiðanífrá ikki gott fyri nakað, uttan at verða kastað út, og at verða traðkað undir mannaføtur.

14 Tit eru ljós heimsins. Ein staður, sum er settur á einum fjalli, kann ei verða fjaldur.

15 Eiheldur kveikja menn eitt kertaljós, og seta tað undir eitt skeppumál, men í ein kertastaka; og tað gevur ljós at øllum sum eru í húsinum.

16 Latið ljós tykkara soleiðis lýsa frammi fyri monnum, at teir mega síggja góðu verk tykkara, og dýrðmeta Faðir tykkara sum er í himni.

17 ¶ Hugsið ikki, at eg eri komin at oyða lógina, ella prophetarnar: eg eri ikki komin at oyða, men at uppfylla.

18 Tí at sanniliga sigi eg tykkum, Til himin og jørð forganga, ēin smástavur ella ēin stavkrókur skal á ongum vísi farast úr lógini, til alt verði uppfylt.

19 Hvørsumhelst *ið* tí skal bróta ēitt av hesum minstu boðum, og skal læra menn soleiðis, hann skal verða kallaður hin minsti í kongadømi himins: men hvørsumhelst *ið* skal gera og frálæra *tey,* hin sami skal verða kallaður mikil í kongadømi himins.

20 Tí at eg sigi tykkum, At uttan rættvísi tykkara skal bera av *rættvísi* hinna skriftlærdu og Pharisēaranna, skulu tit í ongum føri ganga inn í kongadømi himins.

21 ¶ Tit hava hoyrt, at tað varð sagt av teimum frá gamlari tíð, Tú skalt ikki drepa; og hvørsumhelst *ið* skal drepa, skal vera í vanda fyri dóminum:

22 Men eg sigi tykkum, At hvørsumhelst *ið* er vreiður við bróður sín uttan grund, skal vera í vanda fyri dóminum: og hvørsumhelst *ið* skal siga við bróður sín, Rā́-că, skal vera í vanda fyri ráðinum: men hvørsumhelst *ið* skal siga, Tín dári, skal vera í vanda fyri hel-eldi.

23 Tessvegna, um tú komi við gávu tíni til altarið, og har minnirst til, at bróðir tín hevur okkurt ímóti tær;

24 Lat eftir gávu tína har frammanfyri altarið, og far leið tína; fyrst verð samdur við bróður tín, og kom so og ofra gávu tína.

25 Semst við mótstøðumann tín skjótliga, meðan tú ert á veginum við honum; at ikki á nøkrum sinni mótstøðumaðurin gevi teg upp til dómarans, og dómarin gevi teg yvir til tænastumansins, og tú verði kastaður inn í fongsul.

26 Sanniliga sigi eg tær, Tú skalt við^ ongum midlum komast út haðani, til tú hevurt goldið hitt evsta oyra.

27 ¶ Tit hava hoyrt, at tað varð sagt av teimum frá gamlari tíð, Tú skalt ikki fremja hordóm:

28 Men eg sigi tykkum, At hvørsumhelst *ið* hyggur at eini kvinnu *fyri* at girnast eftir henni, hevur framt hordóm við henni longu í hjarta sínum.

29 Og um títt høgra eyga meinbogi teg, slít tað úr, og kasta *tað* frá tær: tí at tað er gagnligt hjá tær at ëin av limum tínum skuldi glatast, og ikki *at* heila likam títt skuldi verðið kastað inn í helviti.

30 Og um tín høgra hond meinbogi teg, sker hana av, og kasta *hana* frá tær: tí at tað er gagnligt hjá tær at ëin av limum tínum skuldi glatast, og ikki *at* heila likam títt skuldi verðið kastað inn í helviti.

31 Tað hevur verðið sagt, Hvørsumhelst *ið* skal koyra burtur konu sína, lat hann geva henni eitt skilnaðarskriv:

32 Men eg sigi tykkum, At hvørsumhelst *ið* skal koyra burtur konu sína, undantikið fyri siðloysis grund, veldur henni at fremja hordóm: og hvørsumhelst *ið* skal giftast við henni sum er fráskild, fremur hordóm.

33 ¶ *Upp*aftur hava tit hoyrt, at tað hevur verðið sagt av teimum frá gamlari tíð, Tú skalt ikki forsvørja teg, men skalt útinna Harranum eiðir tínar:

34 Men eg sigi tykkum, Svørjið ikki yvirhøvur; hvørki við himin; tí at hann er hásæti Guðs:

35 Ella við jørðina; tí at hon er fótskammul hans: eiheldur við Jerusalem; tí at tað er staður hins mikla Kongs.

36 Eiheldur skalt tú svørja við høvur títt, av tí at tú kanst ikki gera ëitt hár hvítt ella svart.

37 Men latið tykkara samskifti vera, Ja, ja; Nei, nei: tí at hvatsumhelst *ið* er meir enn hesi, kemur av illum.

38 ¶ Tit hava hoyrt, at tað hevur verðið sagt, Eyga fyri eyga, og tonn fyri tonn:

39 Men eg sigi tykkum, At tit geri ikki mótstøðu ímóti illum: men hvørsumhelst *ið* skal sláa teg á høgra vanga tín, vend honum hin við.

40 Og um nakar maður vilji kæra teg hjá løgrættinum, og taka burtur kyrtil tín, lat hann hava kápu *tína* við.

41 Og hvørsumhelst *ið* skal noyða teg at ganga eina míl, gakk við honum tvær.

42 Gev honum, sum biður teg; og frá honum, sum vildi læna frá tær, vend tær ikki burtur.

43 ¶ Tit hava hoyrt, at tað hevur verðið sagt, Tú skalt elska næsta tín, og hata fíggjinda tín.

44 Men eg sigi tykkum, Elskið fíggjindar tykkara; vælsignið tey, sum banna tykkum; gerið væl mót teimum, ið hata tykkum; og biðjið fyri teimum, sum meinfýsnisliga brúka tykkum, og søkja at tykkum;

45 At tit mega vera børn Faðirs tykkara sum er í himni: tí at hann fær sól sína at rísa yvir hinum óndu og yvir hinum góðu, og sendir regn á hini rættvísu og á hini órættvísu.

46 Tí at um tit elski tey, sum elska tykkum, hvat endurgjald hava tit? gera ikki sjálvt tollararnir tað sama?

47 Og um tit heilsi brøðrum tykkara einans, hvat gera tit meir *enn aðrir?* gera ikki sjálvt tollararnir so?

48 Verið tit tessvegna fullkomin, enntá eins og Faðir tykkara, sum er í himni, er fullkomin.

KAPITUL 6

GEVIÐ gætur, at tit geri ikki olmussur tykkara frammi fyri monnum, at verða sæddir av teimum: annars hava tit einkið endurgjald av Faðir tykkara sum er í himni.

2 Tessvegna, tá ið tú gert olmussur *tínar,* ljóða ikki ein lúður frammanfyri tær, eins og hyklararnir gera í sýnagogunum og á gøtunum, at teir mega hava heiður av monnum. Sanniliga sigi eg tykkum, Teir hava endurgjald sítt.

3 Men tá ið tú gert olmussur, lat ikki vinstru hond tína vita, hvat høgra hond tín ger:

4 At tínar olmussur mega vera í loyndum: og Faðir tín, sum sær í loyndum, sjálvur hann skal endurgjalda tær opinlýsliga.

5 ¶ Og tá ið tú biðurt, tú skalt ikki vera eins og hyklararnir *eru:* tí at teir elska at biðja, standandi í sýnagogunum og í hornunum av gøtunum, at teir mega verða sæddir av monnum. Sanniliga sigi eg tykkum, Teir hava endurgjald sítt.

6 Men tú, tá ið tú biðurt, far inn í kamar títt, og tá tú hevurt latið aftur hurð tína, bið til Faðirs tíns, sum er í loyndum; og Faðir tín, sum sær í loyndum, skal endurgjalda tær opinlýsliga.

7 Men tá ið tit biðja, nýtið ikki fáfongdar endurtøkur, eins og teir heidnu *gera:* tí at teir halda, at teir skulu verða hoyrdir fyri sítt nógva tos.

8 Verið ikki tit, tessvegna, líkir teimum: tí at Faðir tykkara veit, hvørjum tingum tit hava tørv á, áður enn tit biðja hann.

9 Eftir hesum háttarlagi, tessvegna, biðjið tit: Faðir vár, sum ert í himni; Halgað veri navn títt.

10 Komi kongadømi títt. Veri gjørdur vilji tín á jørð, sum *hann er* í himni.

11 Gev okkum henda dag okkara dagliga breyð.

12 Og fyrigev okkum skuldir okkara, sum vit fyrigeva skuldnarum okkara.

13 Og leið okkum ikki inn í freisting, men bjarga okkum frá illum: Tí at títt er kongadømið, og mátturin, og dýrdin, um ævir. Á-mën.

14 Tí at um tit fyrigevi monnum teirra misgerðir, himinski Faðir tykkara vil eisini fyrigeva tykkum:

15 Men um tit fyrigevi ikki monnum teirra misgerðir, eiheldur vil Faðir tykkara fyrigeva tykkara misgerðir.

16 ¶ Harafturat tá ið tit fasta, verið ikki, eins og hyklararnir, av einum døprum andlitsbrái: tí at teir avskepla síni andlit, at teir mega sýnast yvirfyri monnum at fasta. Sanniliga sigi eg tykkum, Teir hava endurgjald sítt.

17 Men tú, tá ið tú fastart, salva høvur títt, og tváa andlit títt;

18 At tú sýnist ikki yvirfyri monnum at fasta, men yvirfyri Faðir tínum sum er í loyndum: og Faðir tín, sum sær í loyndum, skal endurgjalda tær opinlýsliga.

19 ¶ Leggið ikki niðurfyri til tykkara sjálvs dýrgripir á jørð, har mølur og rustur spilla, og har tjóvar bróta ígjøgn og stjala:

20 Men leggið niðurfyri til tykkara sjálvs dýrgripir í himni, har hvørki mølur ella rustur spilla, og har tjóvar bróta ikki ígjøgn ella stjala:

21 Tí at har *sum* dýrgripur tín er, har vil hjarta títt vera eisini.

22 Ljós likamsins er eygað: um tí eyga títt veri *seg* ëinfalt, alt likam títt skal vera fult av ljósi.

23 Men um eyga títt veri *seg* ónt, alt likam títt skal vera fult av myrkri. Um tí ljósið, sum tær

er í, veri *seg* myrkur, hvør stórt *er* tað myrkrið!

24 ¶ Eingin maður kann tæna tveim meistarum: tí at annaðhvørt vil hann hata tann ēina, og elska hīn; ella annars vil hann halda seg afturat tí ēina, og vanvirða hīn. Tit kunnu ikki tæna Guði og mammon.

25 Tí sigi eg tykkum, Stúrið ikki fyri lívi tykkara, hvat tit skulu eta, ella hvat tit skulu drekka; ella tá fyri likami tykkara, hvat tit skulu fara í. Er ikki lívið meiri enn matur, og likamið *meiri* enn klædnaður?

26 Skoðið fuglarnar í luftini: tí at teir sáa ikki, eiheldur teir heysta, eiheldur savna inn í løður; tó føðir himinski Faðir tykkara teir. Eru tit ikki mikið mætari enn teir?

27 Hvør av tykkum kann við at stúra leggja ēina alin afturat hædd síni?

28 Og hví stúra tit fyri klædnaði? Umhugsið liljurnar á markini, hvussu tær vaksa; tær strevast ikki, eiheldur tær spinna:

29 Og tó sigi eg tykkum, At enntá Sálomon í allari síni dýrd var ikki skrýddur sum ēin av hesum.

30 Hvørsvegna, um Guð soleiðis klæði grasið á markini, hvørt í dag er, og í morgin verður kastað inn í ovnin, *skal hann* ikki mikið meira *klæða* tykkum, O tit av lítlari trúgv?

31 Tessvegna stúrið einkið, sigandi, Hvat skulu vit eta? ella, Hvat skulu vit drekka? ella, Við hvørjum skulu vit verða kløddi?

32 (Tí eftir øllum hesum tingum søkja Heidningarnir:) tí at himinski Faðir tykkara veit, at tit hava tørv á øllum hesum tingum.

33 Men søkið tit fyrst kongadømi Guðs, og rættvísi hansara; og øll hesi tingini skulu verða løgd afturat tykkum.

34 Stúrið tí einkið fyri morgindeginum: tí at morgindagurin skal stúra fyri sínum egna. Deginum nóg mikil *er* ilska hans.

KAPITUL 7

DØMIÐ ikki, at tit verði ikki dømd.

2 Tí at við tí dómi tit døma, skulu tit verða dømd: og við tí máti tit máta, skal tykkum aftur verða mátað.

3 Og hví skoðart tú flísina, sum er í eyga bróðurs tíns, men hugsart ei um bjálkan, sum er í egna eyga tínum?

4 Ella hvussu vilt tú siga við bróður tín, Lat meg hála út flísina út úr eyga tínum; og sí, ein bjálki *er* í egna eyga tínum?

5 Tín hyklari, fyrst kasta út bjálkan út úr egna eyga tínum; og tá skalt tú síggja klárligani at kasta út flísina út úr eyga bróðurs tíns.

6 ¶ Gevið ikki hundunum tað sum er heilagt, eiheldur kasti tit perlur tykkara fyri svín, at ikki tey traðki tær undir føtur sínar, og vendi sær aftur og skræði tykkum *sundur.*

7 ¶ Umbiðjið, og tað skal verða givið tykkum; søkið, og tit skulu finna; bankið *uppá,* og tykkum skal verða latið upp:

8 Tí at hvør tann, ið umbiður, fær; og hann, ið søkir, finnur; og honum, sum bankar *uppá,* skal tað verða latið upp fyri.

9 Ella hvør maður er tað av tykkum, hvørjum, um sonur hansara umbiði breyð, vil hann geva honum ein stein?

10 Ella um hann umbiði ein fisk, vil hann geva honum ein orm?

11 Um tá tit, verandi óndir, vita hvussu geva eigur børnum tykkara góðar gávur, hvør mikið meira skal Faðir tykkara, sum er í himni, geva góð ting til teirra sum umbiða hann?

12 Tessvegna øll ting, hvørjisumhelst tit vildu at menn skuldu gjørt mót tykkum, gerið tit enntá so mót teimum: tí at hetta er lógin og prophetarnir.

13 ¶ Gangið tit inn um hitt tronga portrið: tí at vítt *er* portrið, og breiður *er* vegurin, sum leiðir til undirgangs, og mong tað veri sum ganga inn um tað:
14 Tí at trongt *er* portrið, og mjáur *er* vegurin, sum leiðir til lívs, og fá tað veri sum finna hann.
15 ¶ Varið tykkum fyri følskum prophetum, sum koma til tykkara í seyðaklædnaði, men innvortis eru teir ránskir úlvar.
16 Av teirra fruktum skulu tit kenna teir. Savna menn víndrúvur av tornum, ella fikur av tistlum?
17 Enntá soleiðis ber hvørt gott træ fram góðan ávøkst; men eitt spilt træ ber fram illan ávøkst.
18 Eitt gott træ kann ikki bera fram illan ávøkst, eiheldur *kann* eitt spilt træ bera fram góðan ávøkst.
19 Hvørt træ, sum ber ikki fram góðan ávøkst, verður høgt niður, og kastað inn í eldin.
20 Hvørsvegna av teirra fruktum skulu tit kenna teir.
21 ¶ Ikki hvør tann, ið sigur við meg, Harri, Harri, skal ganga inn í kongadømi himins; men hann, ið ger vilja Faðirs míns, sum er í himni.
22 Mangir vilja siga við meg á hinum degi, Harri, Harri, hava vit ikki propheterað í navni tínum? og í tínum navni hava kastað út djevlar? og í tínum navni gjørt mong undurfull verk?
23 Og tá skal eg vátta teimum, Eg kendi tykkum aldri: farið burtur frá mær, tit ið virka misgerð.
24 ¶ Tessvegna, hvørsumhelst *ið* hoyrir hesar framsagnir mínar, og ger tær, eg vil líkna hann við ein vísan mann, sum bygdi hús sítt uppá ein klett:
25 Og regnið stúrtaði, og flóðirnar komu, og vindarnir blástu, og bardu ímóti tí húsi; og tað fell ikki: tí at tað var grundað uppá ein klett.
26 Og hvør tann ið hoyrir hesar framsagnir mínar, og ger tær ikki, skal verða líknaður við ein fávitskutan mann, sum bygdi hús sítt uppá sandin:
27 Og regnið stúrtaði, og flóðirnar komu, og vindarnir blástu, og bardu ímóti tí húsi; og tað fell: og mikið var fallið av tí.
28 Og tað bar á, tá ið Jesus hevði endað hesar framsagnir, *at* fólkið var ovfarið yvir Guðslæru hansara:
29 Tí at hann lærdi tey sum *ēin* ið hevur myndugleika, og ikki sum hinir skriftlærdu.

KAPITUL 8

TÁ ið hann var komin oman av fjallinum, fylgdu honum miklar mannfjøldir.
2 Og sí, tað kom ein spitalskur og tilbað hann, sigandi, Harri, um tú vilt, tú kanst gera meg reinan.
3 Og Jesus rætti fram *sína* hond, og nam við hann, sigandi, Eg vil; veri tú reinur. Og í stundini varð hansara spitalskni reinsað.
4 Og Jesus sigur við hann, Síggj til, tú ongum manni sigi frá; men far tín veg, sýn teg fyri prestinum, og ofra gávuna sum Móses beyð, til ein vitnisburð at teimum.
5 ¶ Og tá ið Jesus var farin inn í Că-pĕr´-nă-ŭm, kom ein hundraðsovasti til hansara, bønandi hann,
6 Og sigandi, Harri, mín tænari liggur heima sjúkur við lamningum, svárliga pínsladur.
7 Og Jesus sigur við hann, Eg vil koma og grøða hann.
8 Hundraðsovastin svaraði og segði, Harri, eg eri ikki verdigur, at tú skuldirt komið undir tekju mína: men tala orðið einans, og mín tænari skal verða grøddur.
9 Tí at eg eri ein maður undir myndugleika, havandi hermenn undir mær: og eg sigi til henda

mann, Far, og hann fer; og til ein annan, Kom, og hann kemur; og til tænara mín, Ger hetta, og hann ger *tað*.

10 Tá ið Jesus hoyrdi *tað,* undraðist hann, og segði við tey sum fylgdu, Sanniliga sigi eg tykkum, eg havi ikki funnið so mikla trúgv, nei, ikki í Ísrael.

11 Og eg sigi tykkum, At mangir skulu koma úr eystri og vestri, og skulu setast niður við Ábrahami, og Ísaaki, og Jákobi, í kongadømi himins.

12 Men børnini at kongadøminum skulu verða kastaði út í ytra myrkur: har skal vera grátur og tannagrísl.

13 Og Jesus segði við hundraðsovastan, Far tín veg; og eins og tú hevurt trúð, *so* veri tað gjørt tær. Og hansara tænari varð grøddur í sjálvum tí sama tíma.

14 ¶ Og tá ið Jesus var komin inn í húsið hjá Pæturi, sá hann móður konu hansara lagsta, og sjúka av eini hitasótt.

15 Og hann nam við hond hennara, og hitasóttin fór frá henni: og hon reistist, og tænti teimum.

16 ¶ Tá ið kvøldið var komið, førdu tey til hansara mong sum vóru heltikin við djevlum: og hann kastaði út andarnar við orði *sínum,* og grøddi øll sum vóru sjúk:

17 At tað mátti verða uppfylt, sum varð talað við Ê-sâĭ-ăs-i propheti, sigandi, Sjálvur hann tók veikleikar várar, og bar *okkara* sjúkdómar.

18 ¶ Nú, tá ið Jesus sá miklar mannfjøldir um seg, gav hann boð *um* at fara avstað yvirum hīnumegin.

19 Og ein ávísur skriftlærdur kom, og segði við hann, Meistari, eg vil fylgja tær hvagarsumhelst tú fert.

20 Og Jesus sigur við hann, Revarnir hava holur, og fuglarnir í luftini *hava* reiður; men Menniskjusonurin hevur ikki hvar at leggja *sítt* høvur.

21 Og ein annar av hansara lærusveinum segði við hann, Harri, loyv mær fyrst at fara og jarða faðir mín.

22 Men Jesus segði við hann, Fylg mær; og lat tey deyðu jarða síni deyðu.

23 ¶ Og tá ið hann var farin inn í ein bát, fylgdu hansara lærusveinar honum.

24 Og sí, mikið illveður reis á sjógvinum, so mikið, at báturin var huldur av aldunum: men hann svav.

25 Og hansara lærusveinar komu til *hansara,* og vaktu hann, sigandi, Harri, bjarga okkum: vit glatast.

26 Og hann sigur við teir, Hví eru tit óttafullir, O tit av lítlari trúgv? So reistist hann, og hartaði vindarnar og sjógvin; og tað varð blikalogn.

27 Men menninir undraðust, sigandi, Hvørsháttar maður er hesin, at sjálvt vindarnir og sjógvurin lýða hann!

28 ¶ Og tá ið hann var komin yvirum hīnumegin inn í landið hjá Gĕr-gê-sēn´-unum, møttu honum tveir heltiknir við djevlum, komandi út úr grøvunum, framúr harðligir, so at eingin maður mátti farið framvið tann vegin.

29 Og sí, teir geylaðu út, sigandi, Hvat hava vit at gera við teg, Jesus, tú Sonur Guðs? ert tú komin higar at pínsla okkum áðrenn tíðina?

30 Og har var, ein góðan tein burtur frá teimum, eitt fylgi av mongum svínum á biti.

31 So djevlarnir bønaðu hann, sigandi, Um tú kasti okkum út, loyv okkum at fara burtur inn í svínafylgið.

32 Og hann segði við teir, Farið. Og tá ið teir vóru komnir út, fóru teir inn í svínafylgið: og sí, alt svínafylgið rann harðligani

oman *eftir* einum bratta inn í sjógvin, og fórst í vøtnunum.

33 Og teir, sum ansaðu tey, flýddu, og hildu leiðir sínar inn í staðin, og søgdu frá øllum, og hvat hevði viðfarist hinum heltiknu av djevlunum.

34 Og sí, allur staðurin kom út at møta Jesusi: og tá ið tey sóu hann, bønaðu tey *hann,* at hann vildi fara burtur út úr breddum teirra.

KAPITUL 9

OG hann fór inn í ein bát, og fór yvirum, og kom inn í sín egna stað.

2 Og sí, teir førdu til hansara ein mann, sjúkan av lamninginum, liggjandi á eini song: og Jesus, síggjandi trúgv teirra, segði *hann* við hin sjúka av lamninginum; Sonur, ver við gott treyst; syndir tínar veri fyrigivnar tær.

3 Og sí, ávísir av hinum skriftlærdu søgdu innan í sær sjálvum, Hesin *maður* Guðsspottar.

4 Og Jesus, kennandi hugsanir teirra, segði, Hvørsvegna hugsa tit ilt í hjørtum tykkara?

5 Tí at hvørt er lættari, at siga, Syndir *tínar* veri fyrigivnar tær; ella at siga, Reis *teg,* og gakk?

6 Men at tit mega vita, at Menniskjusonurin hevur mátt á jørð at fyrigeva syndir, (tá sigur hann við hin sjúka av lamninginum,) Reis *teg,* tak upp song tína, og far til húss tíns.

7 Og hann reistist, og fór avstað til húss síns.

8 Men tá ið mannfjøldirnar sóu *tað,* undraðust tær, og dýrðmettu Guð, sum hevði givið monnum slíkan mátt.

9 ¶ Og, sum Jesus flutti *seg* fram haðani frá, sá hann ein mann, nevndan Matthæus, sitandi í tollheimtu*búði*ni: og hann sigur við hann, Fylg mær. Og hann reistist, og fylgdi honum.

10 ¶ Og tað bar á, sum Jesus sat til matar í húsinum, sí, mangir tollarar og syndarar komu og settust niður við honum og lærusveinum hansara.

11 Og tá ið Pharisëararnir sóu *tað,* søgdu teir við lærusveinar hansara, Hví etur Meistari tykkara við tollarum og syndarum?

12 Men tá ið Jesus hoyrdi *tað,* segði hann við teir, Teimum, ið eru heilir, tarvast ikki lækna, men teimum ið eru sjúkir.

13 Men farið tit og lærið hvat *tað* merkir, Eg vil hava miskunn, og ikki sláturoffur: tí at eg eri ikki komin at kalla hinar rættvísu, men syndarar til umvendingar.

14 ¶ Tá komu til hansara lærusveinar Jóhannesar, sigandi, Hví fasta vit og Pharisëararnir ofta, men lærusveinar tínir fasta ikki?

15 Og Jesus segði við teir, Kunnu brúðarkamars-børnini syrgja, so leingi sum brúðgómurin er hjá teimum? men teir dagar vilja koma, tá ið brúðgómurin skal verða tikin frá teimum, og tá skulu tey fasta.

16 Eingin maður koyrir eitt stykki av nýggjum toyi *aftur*at einum gomlum klæði, tí at tað, sum verður sett í til at fylla tað upp, tekur frá klæðinum, og skræðingin verður gjørd verri.

17 Eiheldur koyra menn nýtt vín í gamlar kíkar: annars skrædna kíkarnir, og vínið rennur út, og kíkarnir týnast: men teir koyra nýtt vín í nýggjar kíkar, og bæði verða varðveitt.

18 ¶ Meðan hann talaði hesi tingini við teir, sí, har kom ein ávísur stjórnari, og tilbað hann, sigandi, Dóttir mín er beint nú deyð: men kom og legg tína hond uppá hana, og hon skal liva.

19 Og Jesus reistist, og fylgdi honum, og *somuleiðis gjørdu* lærusveinar hansara.

20 ¶ Og sí, ein kvinna, sum var ilskufongd við einum blóðgangi tólv ár, kom aftanfyri *hann,* og nam við faldin á klæði hansara:
21 Tí at hon segði innan í sær sjálvari, Um eg má bert nema við klæði hansara, skal eg verða heil.
22 Men Jesus vendi sær runt, og tá hann sá hana, segði hann, Dóttir, ver við góða uggan; trúgv tín hevur gjørt teg heila. Og kvinnan varð gjørd heil frá tí tíma.
23 Og tá ið Jesus kom inn í húsið hjá stjórnaranum, og sá floytuleikararnar og fólkið haldandi gang,
24 Segði hann við tey, Gevið pláss: tí at moyggin er ikki deyð, men svevur. Og tey læðu hann í háð.
25 Men tá ið fólkini vóru koyrd fram, fór hann inn, og tók í hondina á henni, og moyggin reistist.
26 Og gitið um hetta fór útumkring inn í alt tað landið.
27 ¶ Og tá ið Jesus fór avstað haðani, fylgdu tveir blindir menn honum, rópandi, og sigandi, *Tú* Sonur Dávids, hav miskunn yvir okkum.
28 Og tá ið hann var komin inn í húsið, komu teir blindu menninir til hansara: og Jesus sigur við teir, Trúgva tit, at eg eri førur fyri at gera hetta? Teir søgdu við hann, Ja, Harri.
29 Tá nam hann við eygu teirra, sigandi, Veri tykkum samsvarandi við tykkara trúgv.
30 Og teirra eygu vórðu upplatin; og Jesus strangligani álegði teimum, sigandi, Síggið *til, at* eingin maður viti *tað.*
31 Men teir, tá ið teir vóru farnir avstað, spreiddu umkring hansara giti í øllum tí landinum.
32 ¶ Sum teir fóru út, sí, teir førdu til hansara ein málleysan mann, heltiknan við einum djevli.
33 Og tá ið djevulin var kastaður út, talaði hin málleysi: og mannfjøldirnar undraðust, sigandi, Tað varð aldri soleiðis sætt í Ísrael.
34 Men Pharisēararnir søgdu, Hann kastar út djevlar gjøgnum prins djevlanna.
35 Og Jesus fór runt allar staðirnar og bygdirnar, frálærandi í sýnagogum teirra, og prædikandi gleðiboðskap kongadømisins, og grøðandi hvørja sjúku og hvørja ilsku millum fólksins.
36 ¶ Men tá ið hann sá mannfjøldirnar, varð hann rørdur við várkunn á tey, av tí at tey maktaðust, og vóru spjødd umkring, sum seyðir, havandi ongan hirða.
37 Tá sigur hann við lærusveinar sínar, Heystið sanniligani *er* rúgvismikið, men verkamenninir *eru* fáir;
38 Biðjið tit tessvegna Harra heystsins, at hann vilji senda fram verkamenn inn í heyst sítt.

KAPITUL 10

OG tá ið hann hevði kallað til *sín* sínar tólv lærusveinar, gav hann teim mátt *ímóti* óreinum andum, at kasta teir út, og at grøða øll sløg av sjúku og øll sløg av ilsku.
2 Nú, nøvnini hjá teimum tólv ápostlunum eru hesi; Hin fyrsti, Símun, sum er kallaður Pætur; og Andreas, bróðir hansara; Jákob, *sonur* Zĕb-ē-dēē′-ŭs-ar; og Jóhannes, bróðir hansara;
3 Philippus, og Bartholomæus; Tummas, og Matthæus tollarin; Jákob, *sonur* Ăl-phæ′-ŭs-ar; og Lĕbbæ′-ŭs, hvørs tilnavn var Thăddæ′-ŭs;
4 Símun Cánaanitin; og Judas Iscariot, sum eisini sveik hann.
5 Hesar tólv sendi Jesus út, og beyð teim, sigandi, Farið ikki inn á veg Heidninganna, og inn í *nakran* stað hjá Să-măr-ĭ-tān′-arunum farið tit ei:
6 Men farið heldur til hinar vilstu seyðirnar av Ísraels húsi.
7 Og, sum tit fara, prædikið, og sigið, Kongadømi himins er fyri hond.

8 Grøðið tey sjúku, reinsið tey spitølsku, reisið *upp* hini deyðu, kastið út djevlar: fyri einkið hava tit fingið, fyri einkið gevið.
9 Útvegið hvørki gull, ella silvur, ella kopar í *penga*pungar tykkara,
10 Ella pjøka til ferð *tykkara,* eiheldur tveir kyrtlar, eiheldur skógvar, ella tá stavar: tí at verkamaðurin er føði sína verdigur.
11 Og inn í hvønnsumhelst stað, ella bygd, *ið* tit skulu koma, fregnist, hvør í honum er verdigur; og har verðið *verandi,* til tit fara haðani.
12 Og tá ið tit koma inn í eitt hús, heilsið tí.
13 Og um húsið veri *seg* verdugt, lat tykkara frið koma uppá tað: men um tað veri ikki verdugt, lat tykkara frið venda aftur til tykkara *sjálvs*.
14 Og hvørsumhelst *ið* skal ikki taka ímóti tykkum, ella hoyra orðini hjá tykkum, tá ið tit fara avstað út úr tí húsi ella staði, ristið av støv fóta tykkara.
15 Sanniliga sigi eg tykkum, Tað skal vera meiri úthaldiligt hjá landi Sodomu og Gō-mŏr´-rhŭ á dómsdeginum, enn hjá tí staðinum.
16 ¶ Sí, eg sendi tykkum út eins og seyðir mitt millum úlva: verið tit tí vísir sum høggormar, og meinaleysir sum dúgvur.
17 Men verið varnir fyri monnum: tí at teir vilja geva tykkum upp til dómsráðini, og teir vilja húðfletta tykkum í sýnagogum sínum;
18 Og tit skulu verða førdir framfyri landsstjórar og kongar fyri mína skyld, til ein vitnisburð ímóti teimum og Heidningunum.
19 Men tá ið teir geva tykkum upp, stúrið einkið fyri hvussu ella hvat tit skulu tala: tí at tað skal verða givið tykkum í tí sama tíma, hvat tit skulu tala.
20 Tí at tað eru ikki tit, ið tala, men Andi Faðirs tykkara, sum talar í tykkum.
21 Og bróðirin skal geva upp bróðurin til deyða, og faðirin barnið: og børnini skulu rísa upp ímóti foreldrum *sínum,* og volda teimum at verða tikin av lívi.
22 Og tit skulu verða hataðir av øllum *monnum* fyri navns míns skuld: men hann, ið heldur út til endan, skal verða frelstur.
23 Men tá ið teir søkja at tykkum í hesum staðinum, flýggið tit inn í ein annan: tí at sanniliga sigi eg tykkum, Tit skulu ikki hava farið yvir staðirnar av Ísrael, fyrrenn Menniskjusonurin verði komin.
24 Lærusveinurin er ikki uppiyvir meistara *sínum,* ella tænarin uppiyvir harra sínum.
25 Tað er lærusveininum nóg mikið at hann verði sum meistari hansara, og tænarin sum harri hansara. Hava teir kallað meistaran av húsinum Bē-ĕl´-zĕ-bŭb, hvør mikið meira *skulu teir kalla* teir av húsfólki hansara?
26 Óttist teir ikki, tessvegna: tí at einkið er hult, sum skal ikki verða opinberað; og fjalt, sum skal ei verða kunnugt.
27 Tað, *sum* eg sigi tykkum í myrkri, *tað* talið tit í ljósi: og tað, *sum* tit hoyra í oyranum, *tað* prædikið tit uppiá tekjunum.
28 Og óttist ikki teir sum drepa likamið, men eru ikki førir fyri at drepa sálina: men heldur óttist hann sum er førur fyri at oyðileggja bæði sál og likam í helviti.
29 Verða ikki tveir spurvar seldir fyri ein skilling? og ēin teirra skal ikki falla til jarðarinnar uttan Faðir tykkara.
30 Men sjálvastu hárini á tykkara høvdi eru øll upptøld.
31 Óttist tit ikki, tessvegna, tit eru av meiri virði enn mangir spurvar.
32 Hvørsumhelst *ið* tí skal játta

meg frammi fyri monnum, hann vil eg eisini játta frammi fyri Faðir mínum sum er í himni.
33 Men hvørsumhelst *ið* skal avnokta meg frammi fyri monnum, hann vil eg eisini avnokta frammi fyri Faðir mínum sum er í himni.
34 Hugsið ikki, at eg eri komin at senda frið á jørðina: eg kom ikki at senda frið, men eitt svørð.
35 Tí at eg eri komin at seta ein mann í ósemju ímóti faðir hansara, og dótturina ímóti móður hennara, og verdótturina ímóti vermóður hennara.
36 Og figgindarnir hjá einum manni *skulu vera* tey av hans egna húski.
37 Hann, ið elskar faðir ella móður meir enn meg, er mær ikki verdigur: og hann, ið elskar son ella dóttur meir enn meg, er mær ikki verdigur.
38 Og hann, sum tekur ikki kross sín, og fylgir mær eftir, er mær ikki verdigur.
39 Hann, ið finnur sítt lív, skal missa tað: og hann, ið missir sítt lív fyri mína skyld, skal finna tað.
40 ¶ Hann, ið tekur ímóti tykkum, tekur ímóti mær; og hann, ið tekur ímóti mær, tekur ímóti honum sum sendi meg.
41 Hann, ið tekur ímóti einum prophéti í prophets navni, skal fáa prophets endurgjald; og hann, ið tekur ímóti einum rættvísum manni í rættvís-mans navni, skal fáa rættvís-mans endurgjald.
42 Og hvørsumhelst *ið* skal geva einum av hesum smáu eitt bikar av køldum *vatni* at drekka einans í lærusveins navni, sanniliga sigi eg tykkum, hann skal á ongum vísi missa endurgjald sítt.

KAPITUL 11

OG tað bar á, tá ið Jesus hevði gjørt *seg* lidnan við at skipa sínum tólv lærusveinum, fór hann avstað haðani at frálæra og at prædika í staðum teirra.
2 Nú, tá ið Jóhannes hevði hoyrt í fongslinum verkini hjá Christi, sendi hann tveir av lærusveinum sínum,
3 Og segði við hann, Ert tú hann, ið koma skuldi, ella vænta vit eftir einum øðrum?
4 Jesus svaraði og segði við teir, Farið og sýnið Jóhannesi aftur tey tingini sum tit hoyra og síggja:
5 Tey blindu móttaka sjón sína, og tey lamnu ganga, tey spitølsku verða reinsaði, og tey deyvu hoyra, tey deyðu verða reist upp, og tey fátæku fáa gleðiboðskapin prædikaðan fyri sær.
6 Og vælsignaður er *hann,* hvørsumhelst *ið* skal ei fáa meinboga í mær.
7 ¶ Og sum teir fóru avstað, fór Jesus undir at siga við mannfjøldirnar viðvíkjandi Jóhannesi, Hvat fóru tit út í oyðuna at síggja? Ein sevlegg, ristan við vindinum?
8 Men hvat fóru tit út fyri at síggja? Ein mann, klæddan í mjúkan búnað? sí, teir, sum eru í mjúkum *klædnaði,* eru í kongshúsum.
9 Men hvat fóru tit út fyri at síggja? Ein prophet? ja, eg sigi tykkum, og meir enn ein prophet.
10 Tí at hesin er *hann,* um hvønn tað stendur skrivað, Sí, eg sendi mítt sendiboð undan andliti tínum, sum skal fyribúgva tín veg undan tær.
11 Sanniliga sigi eg tykkum, Millum teirra, sum eru føddir av kvinnum, hevur ikki ein størri stigið upp enn Jóhannes Doyparin: hóast hetta, hann, sum er minstur í kongadømi himins, er størri enn hann.
12 Og frá døgum Jóhannesar Doyparans inntil nú líður kongadømi himins harðskap, og hinir harðligu taka tað við valdi.

13 Tí at allir prophetarnir og lógin propheteraðu inntil Jóhannes.
14 Og um tit vilji taka við *tí,* hesin er Ĕ-lí´-ăs, sum varð fyri at koma.
15 Hann, ið hevur oyru at hoyra, lat hann hoyra.
16 ¶ Men við hvat skal eg líkna hesa ætt? Hon er lík børnum, sitandi á torgunum, og kallandi á sínar felagar,
17 Og sigandi, Vit hava floytað yvirfyri tykkum, og tit hava ikki dansað; vit hava syrgt yvirfyri tykkum, og tit hava ikki harmað.
18 Tí at Jóhannes kom hvørki etandi ella drekkandi, og tey siga, Hann hevur ein djevul.
19 Menniskjusonurin kom etandi og drekkandi, og tey siga, Sí ein mann — átufrekan, og ein vínsvølg, ein vin hjá tollarum og syndarum. Men vísdómur er rættvísgjørdur av børnum sínum.
20 ¶ Tá tók hann at seta at teimum staðunum, í hvørjum *tey* flestu mektigu verkini hjá honum vóru gjørd, av tí at tey vendu ikki um:
21 Vei tær, Chŏ´-rà-zīn! vei tær, Bĕth-să´-ĭ-dŭ! tí at um tey mektigu verkini, sum vóru gjørd í tykkum, høvdu verðið gjørd í Týrus og Sĭ´-dŏn, høvdu tey langt síðani havt vent um í sekkjaklæði og øskum.
22 Men eg sigi tykkum, Tað skal verða meiri úthaldiligt hjá Týrus og Sĭ´-dŏn á dómsdeginum, enn hjá tykkum.
23 Og tú, Că-pĕr´-nă-ŭm, sum ert hevjað upp til himins, skalt verða førd niður til helvitis: tí at um tey mektigu verkini, sum hava verðið gjørd í tær, høvdu verðið gjørd í Sodomu, hevði hann verðið verandi inntil henda dag.
24 Men eg sigi tykkum, At tað skal verða meiri úthaldiligt hjá Sodomulandi á dómsdeginum, enn hjá tær.
25 ¶ Á teirri tíð tók Jesus til orða og segði, Eg takki tær, O Faðir, Harra himins og jarðar, av tí at tú hevurt fjalt hesi tingini fyri hinum vísu og vitru, og hevurt opinberað pinkubørnum tey.
26 Enntá so, Faðir: tí at soleiðis tóktist tað gott í eygsjón tíni.
27 Øll ting eru fingin mær av Faðir mínum: og eingin maður kennir Sonin, uttan Faðirin; eiheldur kennir nakar maður Faðirin, uttan Sonurin, og *hann,* fyri hvørjumsumhelst *ið* Sonurin vil opinbera *hann.*
28 ¶ Komið *higar* til mín, øll *tit* sum strevast og eru tungt byrðað, og eg vil geva tykkum hvílu.
29 Takið ok mítt uppá tykkum, og lærið av mær; tí at eg eri eyðmjúkur og lítillátin í hjarta: og tit skulu finna hvílu at sálum tykkara.
30 Tí at ok mítt *er* nemt, og byrði mín er løtt.

KAPITUL 12

UM tað mundið fór Jesus á sabbatsdeginum ígjøgnum kornið; og hansara lærusveinar vóru einir hungraðir, og tóku at slíta øks av kornum, og at eta *tað.*
2 Men tá ið Pharisēararnir sóu *tað,* søgdu teir við hann, Sí, tínir lærusveinar gera tað sum er ikki lógligt at gera á sabbatsdeginum.
3 Men hann segði við teir, Hava tit ikki lisið hvat Dávid gjørdi, tá ið hann var ein hungraður, og teir ið við honum vóru;
4 Hvussu hann fór inn í hús Guðs, og át sýnisbreyðini, sum var ikki lógligt hjá honum at eta, eiheldur hjá teimum ið við honum vóru, men einans hjá prestunum?
5 Ella hava tit ikki lisið í lógini, hvussu ið á sabbatsdøgunum prestarnir í templinum halgivanvirða sabbatin, og eru ólastandi?
6 Men eg sigi tykkum, At á hesum staði er *ēin,* størri enn templið.
7 Men um tit høvdu vitað, hvat

hetta merkir, Eg vil hava miskunn, og ikki sláturoffur, vildu tit ikki havt fordømt hinar sakleysu.
8 Tí at Menniskjusonurin er Harri, enntá av sabbatsdeginum.
9 Og tá ið hann var farin avstað haðani, fór hann inn í sýnagogu teirra:
10 ¶ Og sí, har var ein maður, sum hevði hond *sína* visnaða. Og teir spurdu hann, sigandi, Er tað lógligt at grøða á sabbatsdøgunum? at teir máttu ákæra hann.
11 Og hann segði við teir, Hvør maður skal tað vera tykkara millum, sum skal hava ēin seyð, og um hann detti inn í eina grøv á sabbatsdeginum, vil hann ikki leggja hald á hann, og lyfta *hann* úr?
12 Hvussu mikið tá er ein maður mætari enn ein seyður? Hvørsvegna tað er lógligt at gera væl á sabbatsdøgunum.
13 Tá sigur hann við mannin, Strekk fram hond tína. Og hann strekti *hana* fram; og hon varð gjørd aftur heil, líka sum hīn.
14 ¶ Tá fóru Pharisēararnir út, og hildu ráðlegging saman ímóti honum, hvussu teir máttu oyða hann.
15 Men tá ið Jesus vitsti *tað*, dró hann seg aftur haðani frá: og miklar mannfjøldir fylgdu honum, og hann grøddi tey øll;
16 Og álegði teimum, at tey skuldu ikki gera hann kunnan:
17 At tað mátti verða uppfylt, sum varð talað við Ê-saî´-ăs-i prophēti, sigandi,
18 Sí tænara mín, hvønn eg havi útvalt; mín háttelskaða, í hvørjum sál mín er væl toknað: eg vil leggja mín anda uppá hann, og hann skal sýna dóm fyri Heidningunum.
19 Hann skal ikki deila, ella geyla; eingin heldur skal nakar maður hoyra hansara rødd á gøtunum.
20 Eitt brákað rør skal hann ikki bróta, og rúkandi veik skal hann ikki sløkkja, til hann sendir fram dóm til sigurs.
21 Og á navn hansara skulu Heidningarnir troysta.
22 ¶ Tá varð førdur til hansara ēin, heltikin við einum djevli, blindur, og málleysur: og hann grøddi hann, so mikið, at hin blindi og málleysi bæði talaði og sá.
23 Og alt fólkið varð ovfarið, og segði, Er ikki hesin sonur Dávids?
24 Men tá ið Pharisēararnir hoyrdu *tað*, søgdu teir, Hesin *felagin* kastar ikki út djevlar, uttan við^ Bē-ēl´-zē-bŭb, prinsi djevlanna.
25 Og Jesus kendi hugsanir teirra, og segði við teir, Hvørt kongadømi, sundurdeilt ímóti sær sjálvum, verður ført til oyðingar; og hvør staður ella hús, sundurdeilt ímóti sær sjálvum, skal ikki standast:
26 Og um Satan kasti út Satan, er hann sundurdeildur ímóti sær sjálvum; hvussu skal tá kongadømi hansara standast?
27 Og um eg við^ Bē-ēl´-zē-bŭb kasti út djevlar, við^ hvørjum kasta børn tykkara *teir* út? tí skulu teir vera dómarar tykkara.
28 Men um eg kasti út djevlar við^ Anda Guðs, tá er kongadømi Guðs komið at tykkum.
29 Ella annars, hvussu kann ēin fara inn í húsið hjá einum sterkum manni, og ræna ognir hansara, uttan hann fyrst bindi hin sterka mannin? og tá vil hann ræna hús hansara.
30 Hann, ið er ikki við mær, er ímóti mær; og hann, ið savnar ikki við mær, spjaðir útumkring.
31 ¶ Hvørsvegna eg sigi tykkum, Alt slag av synd og Guðsspottan skal verða fyrigivin monnum: men Guðsspottanin *ímóti Halga* Andanum skal ikki verða fyrigivin monnum.

32 Og hvørsumhelst *ið* talar eitt orð ímóti Menniskjusyninum, tað skal verða fyrigivið honum: men hvørsumhelst *ið* talar ímóti Halga Andanum, tað skal ikki verða fyrigivið honum, hvørki í hesi verøld, eiheldur í hini komandi *verøld*.

33 Gerið annaðhvørt træið gott, og tess ávøkst góðan; ella annars gerið træið spilt, og ávøkst tess spiltan: tí at træið kennist av ávøksti *tess*.

34 O avkom av eiturormum, hvussu kunnu tit, verandi óndir, tala góðar lutir? tí út av yvirflóð hjartans muðurin mælir.

35 Ein góður maður út úr góðu goymslu hjartans ber fram góðar lutir: og ein óndur maður út úr óndu goymsluni ber fram óndar lutir.

36 Men eg sigi tykkum, At hvørt ógagnsorð sum menn skulu tala, teir skulu geva roknskap harav á dómsdeginum.

37 Tí av orðum tínum skalt tú verða rættvísgjørdur, og av orðum tínum skalt tú verða dómfeldur.

38 ¶ Tá tóku ávísir av hinum skriftlærdu og av Pharisēarunum til orða, sigandi, Meistari, vit vildu sæð eitt tekin frá tær.

39 Men hann svaraði og segði við teir, Ein ónd og horfikin ætt sóknast eftir einum tekini; og tað skal einkið tekin verða givið henni, uttan tekin Jónasar prophets:

40 Tí at eins og Jónas var tríggjar dagar og tríggjar nætur í búki hvalsins; soleiðis skal Menniskjusonurin verða tríggjar dagar og tríggjar nætur í hjarta jarðarinnar.

41 Menninir úr Nīn-ē-vēh skulu rísa í dómi við hesi ætt, og skulu dómfella hana: av tí at teir vendu um við prædiku Jónasar; og sí, ēin, størri enn Jónas, *er* her.

42 Drotningin úr suðuri skal rísa upp í dóminum við hesi ætt, og skal dómfella hana: tí at hon kom frá ytstu pørtum jarðarinnar at hoyra vísdóm Sálomons; og sí, ēin, størri enn Sálomon, *er* her.

43 Tá ið hin óreini andin er farin út úr einum manni, gongur hann gjøgnum turr støð, søkjandi hvílu, og finnur onga.

44 Tá sigur hann, Eg vil venda aftur inn í hús mítt, hvaðani frá eg kom út; og tá ið hann er komin, finnur hann *tað* tómt, sópað, og prýtt.

45 Tá fer hann, og tekur við sær sjálvum sjey aðrar andar, meiri vondir enn sjálvur hann, og teir fara inn og búgva har: og hin síðsti *standurin* hjá tí manninum verður verri enn hin fyrsti. Enntá soleiðis skal tað verða eisini hjá hesi vondu ætt.

46 ¶ Meðan hann enn talaði til fólksins, sí, móðir *hansara* og brøður hansara stóðu fyri uttan, tráandi at tala við hann.

47 Tá segði ēin við hann, Sí, móðir tín og brøður tínir standa fyri uttan, tráandi at tala við teg.

48 Men hann svaraði og segði við hann sum segði honum *hetta,* Hvør er móðir mín? og hvørjir eru brøður mínir?

49 Og hann rætti fram sína hond móti lærusveinum sínum, og segði, Sí móður mína og brøður mínar!

50 Tí at hvørsumhelst *ið* skal gera vilja Faðirs míns, sum er í himni, hin sami er bróðir mín, og systir, og móðir.

KAPITUL 13

HIN sama dagin fór Jesus út úr húsinum, og settist við sjóvarmálan.

2 Og miklar mannfjøldir vóru savnaðar saman at honum, so at hann fór inn í ein bát, og settist; og øll mannfjøldin stóð við sjóvarmálan.

3 Og hann talaði mong ting til teirra í dømisøgum, sigandi, Sí, ein sáðmaður fór út at sáa;
4 Og tá ið hann sáaði, fullu summi *sáðkorn* framvið vegkantin, og fuglarnir komu og gloyptu tey upp:
5 Summi fullu uppá grýtutar staðir, har tey høvdu ikki nógva mold: og við tað sama spruttu tey upp, av tí at tey høvdu onga dýpd av mold:
6 Og tá ið sólin var uppi, vórðu tey sviðin; og av tí at tey høvdu onga rót, følnaðu tey burtur.
7 Og summi fullu millum torna; og tornirnir spruttu upp, og køvdu tey:
8 Men onnur fullu inn í góða jørð, og bóru fram ávøkst, summi hundraðfaldan, summi sekstifaldan, summi tríatifaldan.
9 Hvør oyru hevur at hoyra, lat hann hoyra.
10 Og lærusveinarnir komu, og søgdu við hann, Hví talart tú við tey í dømisøgum?
11 Hann svaraði og segði við teir, Tí at tykkum er tað givið at kenna loyndardómar kongadømis himins, men til teirra er tað ikki givið.
12 Tí at hvørsumhelst *ið* hevur, til hansara skal verða givið, og hann skal hava meiri ríkiligsemi: men hvørsumhelst *ið* hevur ikki, frá honum skal verða tikið burtur enntá tað hann hevur.
13 Tí tali eg til teirra í dømisøgum: av tí at tey síggjandi síggja ikki, og hoyrandi tey hoyra ikki, eiheldur tey skilja.
14 Og í teimum er uppfylt prophetī Ē-sāĭ´-ăs-ar, sum sigur, Við at hoyra skulu tit hoyra, og skulu ikki skilja; og síggjandi skulu tit síggja, og skulu ikki varnast:
15 Tí at hjartað á hesum fólki er vaksið dølskt, og *teirra* oyru eru dul at hoyra, og síni eygu hava tey lokað; at ikki til nakra tíð tey skuldu sæð við eygum *sínum,* og hoyrt við oyrum *sínum,* og skuldu skilt við hjarta *sínum,* og skuldu verðið umvend, og eg skuldi grøtt tey.
16 Men vælsignað *eru* eygu tykkara, tí at tey síggja: og oyru tykkara, tí at tey hoyra.
17 Tí at sanniliga sigi eg tykkum, At mangir prophetar og rættvísir *menn* hava tráað at síggja *teir lutir* sum tit síggja, og hava ikki sæð *teir;* og at hoyra *teir lutir* sum tit hoyra, og hava ikki hoyrt *teir.*
18 ¶ Hoyrið tit tessvegna dømisøgu sáðmansins.
19 Tá ið ēinhvør hoyrir orð kongadømisins, og skilur *tað* ikki, tá kemur *hin* vondi, og nápar burtur tað sum varð sáað í hjarta hansara. Hetta er hann sum tók ímóti sáðkorni við vegkantin.
20 Men hann sum tók ímóti sáðkorninum inn í grýtutar staðir, hin sami er hann sum hoyrir orðið, og straks við fagnaði tekur ímóti tí;
21 Tó hevur hann ikki rót í sær sjálvum, men heldur á í eina tíð: tí at tá ið trongsla ella atsókn rísur uppá grund av orðinum, alt fyri eitt fær hann meinboga.
22 Hann eisini, sum tók ímóti sáðkorni millum tornanna, er hann sum hoyrir orðið; og stúranin av hesum heimi, og svikafullsemin av ríkidømum, køva orðið, og hann gerst ófruktsamur.
23 Men hann, sum tók ímóti sáðkorni inn í ta góðu jørðina, er hann sum hoyrir orðið, og skilur *tað;* sum eisini ber ávøkst, og ber fram, summir hundraðfaldan, summir seksti, summir tríati.
24 ¶ Eina aðra dømisøgu setti hann fram at teimum, sigandi, Kongadømi himins er líknað einum manni sum sáaði gott sáð í akur sín:
25 Men meðan menn svóvu, kom hansara fíggindi og sáaði

illgresi millum hveitisins, og fór leið sína.
26 Men tá ið blaðið var sprottið upp, og bar fram ávøkst, tá komu illgrøsini til sjóndar eisini.
27 So komu tænararnir hjá húseigaranum og søgdu við hann, Tygum, sáaðu tygum ikki gott sáð í akur tygara? hvaðan hevur hann tá illgrøs?
28 Hann segði við teir, Hetta hevur ein figgindi gjørt. Tænararnir søgdu við hann, Vilt tú tá, at vit fara og lúka tey upp?
29 Men hann segði, Nei; at ikki, meðan tit lúka illgrøsini upp, tit *slíti* upp við rót eisini hveitið við teimum.
30 Latið bæði vaksa saman inntil heystið: og í heystartíð vil eg siga við innheystararnar, Savnið tit saman fyrst illgrøsini, og bindið tey í bundir at brenna tey: men savnið hveitið inn í løðu mína.
31 ¶ Eina aðra dømisøgu setti hann fram at teimum, sigandi, Kongadømi himins er líkt við eitt sinopskorn, sum ein maður tók, og sáaði í akur sín:
32 Sum víst er hitt minsta av øllum sáðkornum: men tá ið tað er vaksið, er tað tað største millum urta, og gerst eitt træ, so at fuglar luftarinnar koma og búleikast í greinum tess.
33 ¶ Eina aðra dømisøgu talaði hann yvirfyri teimum; Kongadømi himins er líkt súrdeiggi, hvørt ein kvinna tók, og goymdi í trimum málum av mjøli, til tað heila var sýrað.
34 Øll hesi tingini talaði Jesus við mannfjøldina í dømisøgum; og uttan dømisøgu talaði hann ikki við tey:
35 At tað mátti verða uppfylt, sum varð talað við prophetinum, sigandi, Eg vil lata upp munn mín í dømisøgum; eg vil mæla lutir, sum hava verið hildnir loyndir frá grundlegging veraldarinnar.
36 Tá sendi Jesus mannfjøldina avstað, og fór inn í húsið: og hansara lærusveinar komu til hansara, sigandi, Greina okkum dømisøguna um illgrøsini í akrinum.
37 Hann svaraði og segði við teir, Hann, sum sáar tað góða sáðið, er Menniskjusonurin;
38 Akurin er heimurin; tað góða sáðið eru børn kongadømisins, men illgrøsini eru børnini at *hinum* vonda;
39 Fíggindin, sum sáaði tey, er djevulin; heystið er endi veraldarinnar; og innheystararnir eru einglarnir.
40 Eins og tí illgrøsini verða savnaði og brend í eldinum; soleiðis skal tað verða við endan á hesi verøld.
41 Menniskjusonurin skal senda út einglar sínar, og teir skulu savna úr hansara kongadømi øll ting sum *volda* meinboga, og teir sum gera misgerð;
42 Og skulu kasta teir inn í ein brædsluovn av eldi: har skal verða grátur og tannagrísl.
43 Tá skulu teir rættvísu skína fram sum sólin í kongadømi Faðirs teirra. Hvør oyru hevur at hoyra, lat hann hoyra.
44 ¶ Aftur er kongadømi himins líkt dýrgripi, goymdum í einum akri; hvønn, tá ið ein maður hevur funnið, hann fjalir, og av frøi um tað fer og selur alt sum hann hevur, og keypir tann akurin.
45 ¶ Aftur er kongadømi himins líkt einum keypmanni, sóknandi *eftir* vøkrum perlum:
46 Hvør, tá ið hann hevði funnið ēina perlu av miklum virði, fór og seldi alt sum hann hevði, og keypti hana.
47 ¶ Aftur er kongadømi himins líkt eini nót, sum varð kastað inn í sjógvin, og savnaði av hvørjum slagi:
48 Hvørja, tá ið hon var full,

teir drógu til strandar, og settust niður, og savnaðu hinar góðu inn í íløt, men kastaðu teir vánaligu burtur.

49 Soleiðis skal tað verða við enda veraldarinnar: einglarnir skulu koma fram, og skilja hinar vondu burturúr teimum rættvísu,

50 Og skulu kasta teir inn í brædsluovnin av eldi: har skal vera grátur og tannagrísl.

51 Jesus sigur við teir, Hava tit skilt øll hesi tingini? Teir siga við hann, Ja, Harri.

52 Tá segði hann við teir, Tí er hvør skriftlærdur, *sum er* undirvístur til kongadømis himins, líkur einum manni *sum er* ein húseigari, sum tekur fram úr síni skattagoymslu nýggj og gomul *ting*.

53 ¶ Og tað bar á, *at* tá ið Jesus hevði endað hesar dømisøgur, fór hann avstað haðani.

54 Og tá ið hann var komin inn í sítt egna land, lærdi hann teir í sýnagogu teirra, so mikið at teir vórðu ovfarnir, og søgdu, Hvaðani hevur hesin *maður* henda vísdóm, og *hesi* mektigu verk?

55 Er ikki hetta sonur træsmiðarins? er ikki móðir hansara kallað Maria? og hansara brøður Jákob, og Jó´sēs, og Símun, og Judas?

56 Og hansara systrar, eru tær ikki allar *her* hjá okkum? Hvaðani hevur hesin *maður* tá allar hesar lutir?

57 Og teir fingu meinboga av honum. Men Jesus segði við teir, Ein prophetur er ikki uttan heiður, undantikið í sínum egna landi, og í sínum egna húsi.

58 Og hann gjørdi ikki mong mektig verk har, uppá grund av teirra vantrúgv.

KAPITUL 14

UM tað mundið hoyrdi Heródes fjórðingsfúrsti um *navn*giti Jesu,

2 Og segði við tænarar sínar, Hetta er Jóhannes Doyparin; hann er risin frá hinum deyðu; og tí sýna fram mektig verk seg sjálv í honum.

3 ¶ Tí Heródes hevði lagt hald á Jóhannes, og bundið hann, og sett *hann* í fongsul fyri skuld Hē-ró-dī´-ās-ar, konu Philippusar, bróður síns.

4 Tí Jóhannes segði við hann, Tað er ikki lógligt hjá tær at hava hana.

5 Og tá ið hann vildi havt tikið hann av lívi, óttaðist hann mannfjøldina, av tí at tey roknaðu hann sum ein prophet.

6 Men tá ið føðingardagur Heródesar varð hildin, dansaði dóttir Hē-ró-dī´-ās-ar frammi fyri teimum, og toknaði Heródesi.

7 Við hvat hann heitti við einum eiði at geva henni hvatsumhelst hon vildi umbiðja.

8 Og hon, verandi áður undirvíst av móður síni, segði, Gev mær her høvur Jóhannesar Doyparans á einum fati.

9 Og kongurin varð syrgin: hóast hetta, vegna eiðarins, og teirra sum sótu við honum til matar, beyð hann, at *tað skuldi* verða givið *henni*.

10 Og hann sendi, og hálshøgdi Jóhannes í fongslinum.

11 Og hans høvur varð borið á einum fati, og givið til gentuna: og hon førdi *tað* til móður sína.

12 Og hansara lærusveinar komu, og tóku upp likamið, og jarðaðu tað, og fóru og søgdu Jesusi.

13 ¶ Tá ið Jesus hoyrdi *um tað*, fór hann avstað haðani við báti inná eitt oyðistað ēinsæris: og tá ið fólkið hevði hoyrt *um tað*, fylgdu tey honum til fóts út úr staðunum.

14 Og Jesus fór fram, og sá eina mikla mannfjøld, og varð rørdur við várkunn mótvegis teimum, og hann grøddi *hini* sjúku teirra.

15 ¶ Og tá ið tað var aftan, komu hansara lærusveinar til hansara, sigandi, Hetta er eitt oyðistað, og tíðin nú útliðin; send mannamúgvuna avstað, at tey mega fara inn í bygdirnar, og keypa sær vistir.

16 Men Jesus segði við teir, Teimum nýtist ikki fara avstað; gevið tit teimum at eta.

17 Og teir siga við hann, Vit hava her einans fimm breyð, og tveir fiskar.

18 Hann segði, Berið tey higar til mín.

19 Og hann skipaði mannamúgvuni at setast niður á grasið, og tók tey fimm breyðini, og teir báðar fiskarnar, og, lítandi upp til himins, vælsignaði hann, og breyt, og gav breyðini til lærusveina *sína,* og lærusveinarnir til mannfjøldarinnar.

20 Og teir ótu allir, og vórðu mettaðir: og teir hentaðu upp av molunum, sum lupu av, tólv fullar tægur.

21 Og teir, sum høvdu etið, vóru umleið fimm túsund menn, umframt konur og børn.

22 ¶ Og beinanvegin noyddi Jesus lærusveinar sínar at fara inn í ein bát, og at fara undan honum yvirum hinumegin, meðan hann sendi mannamúgvurnar avstað.

23 Og tá ið hann hevði sent mannamúgvurnar avstað, fór hann niðan á eitt fjall ēinsæris at biðja: og tá ið aftanin var komin, var hann har einsamallur.

24 Men báturin var nú mitt úti á sjógvinum, syftur við aldunum: tí at vindurin var andstøðis.

25 Og í tí fjórðu náttarvøkuni fór Jesus at teimum, gangandi á sjógvinum.

26 Og tá ið lærusveinarnir sóu hann gangandi á sjógvinum, vórðu teir órógvaðir, sigandi, Tað er ein andi; og teir róptu út vegna ótta.

27 Men beinanvegin talaði Jesus til teirra, sigandi, Verið við gott treyst; tað eri eg; verið ikki ræddir.

28 Og Pætur svaraði honum og segði, Harri, um tað veri tú, bjóða mær *at* koma at tær á vatninum.

29 Og hann segði, Kom. Og tá ið Pætur var komin niður út úr bátinum, gekk hann á vatninum, til at fara til Jesu.

30 Men tá ið hann sá vindin *hin* rokmikla, varð hann ræddur; og, byrjandi at søkka, rópti hann, *og* segði, Harri, frels meg.

31 Og Jesus í stundini rætti fram *sína* hond, og loftaði honum, og segði við hann, O tú av lítlari trúgv, hvørsvegna ivaðirst tú?

32 Og tá ið teir vóru komnir inn í bátin, steðgaði vindurin.

33 Tá komu teir sum vóru í bátinum, og tilbóðu hann, sigandi, Av sonnum, tú ert Sonur Guðs.

34 ¶ Og tá ið teir vóru farnir yvirum, komu teir inn í land Gĕn-nēs´-â-rĕt-s.

35 Og tá ið menninir av tí staðnum kendust við hann, sendu teir inn í alt tað landið runt umkring, og førdu til hansara øll sum vóru ilskufongd;

36 Og bønaðu hann, at tey máttu nema einans við faldin á klæði hansara: og so mong, sum nomu, vórðu gjørd fullkomiliga heil.

KAPITUL 15

TÁ komu til Jesu skriftlærdir og Pharisēarar, sum vóru úr Jerusalem, sigandi,

2 Hví misbróta lærusveinar tínir sið hinna eldru? tí at teir tváa ikki hendur sínar, tá ið teir eta breyð.

3 Men hann svaraði og segði við teir, Hví eisini misbróta tit boðið hjá Guði við siði tykkara?

4 Tí at Guð beyð, sigandi, Æra faðir tín og móður: og, Hann ið

bølbiður faðir ella móður, lat hann doyggja deyðan.

5 Men tit siga, Hvørsumhelst *ið* skal siga til faðir *sín* ella móður *sína, Tað er* ein gáva, við hvørjumsumhelst tú máttirt verðið gagnaður av mær;

6 Og æri ikki faðir sín ella móður sína, *hann skal vera fríur*. Soleiðis hava tit gjørt boðið hjá Guði av ongari virkni við siði tykkara.

7 *Tykkara* hyklarar, væl prophteraði Ē-sāĭ´-ās um tykkum, sigandi,

8 Hetta fólkið dregst nær mær við sínum munni, og ærir meg við *sínum* vørrum; men teirra hjarta er fjart frá mær.

9 Men til fánýtis tilbiðja tey meg, frálærandi *fyri* Guðslærur boðini hjá monnum.

10 ¶ Og hann kallaði mannamúgvuna, og segði við tey, Hoyrið og fatið:

11 Ikki tað, sum fer inn í munnin, dálkar ein mann; men tað, sum kemur út úr munninum, hetta dálkar ein mann.

12 Tá komu lærusveinar hansara, og søgdu við hann, Veitst tú, at Pharisēararnir fingu meinboga, eftir *at* teir hoyrdu hesa framsøgn?

13 Men hann svaraði og segði, Hvør planta, sum mín himinski Faðir hevur ikki sett niður, skal verða tikin upp við rót.

14 Latið teir vera: teir veri *seg* blindir leiðarar av hinum blindu. Og um hin blindi leiði hin blinda, *tá* skulu báðir falla inn í veitina.

15 Tá tók Pætur til orða og segði við hann, Greina okkum hesa dømisøgu.

16 Og Jesus segði, Eru tit eisini enn uttan skil?

17 Skilja tit ikki enn, at hvatsumhelst *ið* gongur inn við munnin, fer inn í magan, og verður kastað út í frárenningina?

18 Men teir lutir, sum útganga út úr munninum, koma fram frá hjartanum; og teir dálka mannin.

19 Tí at út úr hjartanum útganga illar hugsanir, myrðir, horfremjanir, leysalevnaðir, tjóvaríir, falskur vitnisburður, Guðsspottanir:

20 Hesi eru *tingini* sum dálka ein mann: men at eta við ótváaðum hondum dálkar ikki mann.

21 ¶ Tá fór Jesus haðani, og fór avstað inn í umráðini av Týrus og Sĭ´-dŏn.

22 Og sí, ein kvinna úr Cānaan kom út úr hinum somu umráðunum, og rópaði til hansara, sigandi, Hav miskunn yvir meg, O Harri, *tú* Sonur Dávids; dóttir mín er herviliga plágað við einum djevli.

23 Men hann svaraði henni ikki eitt orð. Og hansara lærusveinar komu og bønaðu hann, sigandi, Send hana avstað; tí hon rópar eftir okkum.

24 Men hann svaraði og segði, Eg eri ikki sendur, uttan til hinar vilstu seyðirnar av Ísraels húsi.

25 Tá kom hon og tilbað hann, sigandi, Harri, hjálp mær.

26 Men hann svaraði og segði, Tað er ikki søminligt at taka breyðið hjá børnunum, og at kasta *tað* til hunda.

27 Og hon segði, Sannleiki, Harri: tó eta hundarnir av molunum sum detta av borðinum hjá meistara sínum.

28 Tá svaraði Jesus og segði við hana, O kvinna, stór *er* trúgv tín: veri tær enntá sum tú vilt. Og dóttir hennara varð gjørd heil frá sjálvum tí tíma.

29 Og Jesus fór avstað haðani frá, og kom nær Galilēu-sjónum; og fór niðan á eitt fjall, og settist niður har.

30 Og miklar mannfjøldir komu til hansara, havandi við sær *tey sum vóru* lamin, blind, málleys, vanfør, og mong onnur, og kastaðu tey niður við Jesu føtur; og hann grøddi tey:

31 So mikið, at mannfjøldin undraðist, tá ið tey sóu tey málleysu at tala, tey vanføru at verða heil, tey lamnu at ganga, og tey blindu at síggja: og tey dýrðmettu Guð Ísraels.

32 ¶ Tá kallaði Jesus lærusveinar sínar *at sær,* og segði, Eg havi várkunn yvir mannfjøldina, tí at tey halda áfram við mær nú tríggjar dagar, og hava einkið at eta: og eg vil ikki senda tey avstað fastandi, at ikki tey maktist á veginum.

33 Og hansara lærusveinar siga við hann, Hvaðani skuldu vit havt so mikið breyð í oyðuni, sum til at mettað eina so mikla mannamúgvu?

34 Og Jesus sigur við teir, Hvussu mong breyð hava tit? Og teir søgdu, Sjey, og nakrar fáar smáfiskar.

35 Og hann beyð mannfjøldini at setast niður á jørðina.

36 Og hann tók tey sjey breyðini og fiskarnar, og veitti tøkkir, og breyt *tey,* og gav til lærusveina sína, og lærusveinarnir til mannfjøldarinnar.

37 Og tey ótu øll, og vórðu mettaði: og teir tóku upp av tí brotna *matinum,* sum var eftir, sjey fullar tægur.

38 Og teir, sum ótu, vóru fýra túsund menn, umframt konur og børn.

39 Og hann sendi mannfjøldina avstað, og tók bát, og kom inn í umráðini av Măg´-dă-lă.

KAPITUL 16

PHARISĒARARNIR eisini við Săd-dû-cēē´-arunum komu, og freistandi tráaðu hann, at hann vildi sýnt teimum eitt tekin frá himni.

2 Hann svaraði og segði við teir, Tá ið tað er aftan, siga tit, *Tað fer at verða* vakurt veður: tí at luftin er reyð.

3 Og um morgunin, *Tað fer at verða* ódámligt veður í dag: tí at luftin er reyð og skýmlig. O *tykkara* hyklarar, tit duga at skyna á yvirborði luftarinnar; men duga tit ikki *at skyna á* teknum tíðanna?

4 Ein ónd og horfikin slekt søkir eftir einum tekini; og tað skal einkið tekin verða givið henni, uttan tekin Jónasar prophets. Og hann fór frá teimum, og fór avstað.

5 Og tá ið hansara lærusveinar vóru komnir yvirum hīnumegin, høvdu teir gloymt at tikið breyð.

6 ¶ Tá segði Jesus við teir, Gevið gætur eftir og verið varnir fyri súrdeiggi Pharisēaranna og Săd-dû-cēē´-aranna.

7 Og teir tingaðust sín ámillum, sigandi, *Tað er* av tí at vit einkið breyð hava tikið.

8 *Hvørt,* tá ið Jesus varnaðist, segði hann við teir, O tit av lítlari trúgv, hví tingast tit tykkara millum, av tí at tit einkið breyð hava tikið?

9 Skilja tit ikki enn, eiheldur minnast hini fimm breyð hinna fimm túsund, og hvussu mangar tægur tit hentaðu upp?

10 Eiheldur hini sjey breyð hinna fýra túsund, og hvussu mangar tægur tit hentaðu upp?

11 Hvussu er tað, at tit skilja ikki, at eg talaði *tað* ikki til tykkara viðvíkjandi breyði, at tit skuldu vara tykkum fyri súrdeiggi Pharisēaranna og Săd-dû-cēē´-aranna?

12 Tá skiltu teir, hvussu ið hann beyð *teimum* ikki *at* vara seg fyri súrdeignum av breyði, men fyri Guðslæru Pharisēaranna og Săd-dû-cēē´-aranna.

13 ¶ Tá ið Jesus kom inn í breddarnar av Çæ-sâ-rē´-ă Philippī, spurdi hann lærusveinar sínar, sigandi, Hvønn siga menn at eg Menniskjusonurin eri?

14 Og teir søgdu, Summir *siga, at tú ert* Jóhannes Doyparin: summir, Ĕ-lĭ´-ăs; og aðrir, Jeremias, ella ēin av prophetunum.

15 Hann sigur við teir, Men hvør siga tit at eg eri?

16 Og Símun Pætur svaraði og segði, Tú ert Christus˘, Sonur hins livandi Guðs.

17 Og Jesus svaraði og segði við hann, Vælsignaður ert tú, Símun Bâr-jó´-nă: tí at kjøt og blóð hevur ikki opinberað tær *tað,* men Faðir mín sum er í himni.

18 Og eg sigi eisini við teg, At tú ert Pætur, og uppá henda klett vil eg byggja kirkju mína; og helvitis portur skulu ikki fáa yvirvág ímóti tí.

19 Og eg vil geva tær lyklar kongadømis himins: og hvatsumhelst *ið* tú skalt binda á jørð, skal vera bundið í himni: og hvatsumhelst *ið* tú skalt loysa á jørð, skal vera loyst í himni.

20 Tá álegði hann lærusveinum sínum, at teir ongum manni skuldu siga, at hann var Jesus Christus˘.

21 ¶ Frá teirri tíð fram fór Jesus undir at sýna lærusveinum sínum, hvussu ið hann mátti fara til Jerusalem, og líða mong ting av teimum elstu og fremstu prestunum og skriftlærdu, og verða dripin, og verða reistur aftur hin triðja dagin.

22 Tá tók Pætur hann, og tók at harta hann, sigandi, Veri tað fjart frá tær, Harri: hetta skal ikki verða tær.

23 Men hann vendi *sær,* og segði við Pætur, Slepp tær afturum meg, Satan: tú ert mær ein meinbogi: tí at tú gáart ikki eftir teimum tingunum sum veri *seg* av Guði, men eftir teimum sum veri *seg* av monnum.

24 ¶ Tá segði Jesus við lærusveinar sínar, Um nakar *maður* vilji koma aftaná mær, lat hann avnokta sjálvan seg, og taka upp kross sín, og fylgja mær.

25 Tí at hvørsumhelst *ið* vil frelsa sítt lív, skal missa tað: og hvørsumhelst *ið* vil missa sítt lív fyri mína skyld, skal finna tað.

26 Tí at hvat verður ein maður gagnaður, um hann skal vinna heila heimin, og missa sína egnu sál? ella hvat skal ein maður geva í viðurlag fyri sína sál?

27 Tí at Menniskjusonurin skal koma í dýrd Faðirs síns við einglum sínum; og tá skal hann endurgjalda hvørjum manni samsvarandi við verk˘ hansara.

28 Sanniliga sigi eg tykkum, Tað veri summir sum standa her, sum skulu ikki smakka av deyða, fyrrenn teir síggja Menniskjusonin komandi í kongadømi sínum.

KAPITUL 17

OG eftir seks dagar tekur Jesus Pætur, Jákob, og Jóhannes — bróður hansara, og leiðir teir niðan á eitt høgt fjall ēinsæris,

2 Og varð umbroyttur frammi fyri teimum: og hans andlit skein sum sólin, og hansara klædnaður varð hvítur sum ljósið.

3 Og sí, tað birtust teimum Móses og Ĕ-lĭ´-ăs, talandi við hann.

4 Tá tók Pætur til orða, og segði við Jesus, Harri, tað er gott hjá okkum at vera her: um tú vilt, lat okkum gera her trý tabernakkul; ēitt til tín, og ēitt til Mósesar, og ēitt til Ĕ-lĭ´-ăs-ar.

5 Meðan hann enn talaði, sí, eitt bjart skýggj skuggaði yvir teir: og sí ein rødd út úr skýgginum, sum segði, Hesin er mín háttelskaði Sonur, í hvørjum eg eri væl toknaður; hoyrið tit hann.

6 Og tá ið lærusveinarnir hoyrdu *tað,* fullu teir á andlit sítt, og vóru sára ræddir.

7 Og Jesus kom og nam við teir, og segði, Reisist, og verið ikki ræddir.

8 Og tá ið teir høvdu lyft upp eygum sínum, sóu teir ongan mann uttan Jesus eina.

9 Og, sum teir komu oman av fjallinum, álegði Jesus teimum, sigandi, Sigið sjónina fyri ongum manni, inntil Menniskjusonurin verði risin aftur frá hinum deyðu.

10 Og hansara lærusveinar spurdu hann, sigandi, Hví siga tá hinir skriftlærdu, at Ē-lī´-ās má fyrst koma?

11 Og Jesus svaraði og segði við teir, Ē-lī´-ās sanniliga skal fyrst koma, og endurbøta øll ting.

12 Men eg sigi tykkum, At Ē-lī´-ās er komin longu, og teir kendu hann ikki, men hava gjørt við hann hvatsumhelst teimum lysti. Líkaleiðis skal eisini Menniskjusonurin líða av teimum.

13 Tá skiltu lærusveinarnir, at hann talaði til teirra um Jóhannes Doyparan.

14 ¶ Og tá ið teir vóru komnir til mannamúgvunnar, kom tað til hansara ein *ávísur* maður, knelandi niður fyri honum, og sigandi,

15 Harri, hav miskunn yvir son mín: tí at hann er mánasjúkur, og sára plágaður: tí at mangan fellur hann inn í eldin, og ofta inn í vatnið.

16 Og eg leiddi hann til lærusveina tína, og teir kundu ikki lekja hann.

17 Tá svaraði Jesus og segði, O trútóma og rangsnúna ætt, hvussu leingi skal eg vera hjá tykkum? hvussu leingi skal eg tola tykkum? leiðið hann higar til mín.

18 Og Jesus hartaði djevulin; og hann fór burtur út úr honum: og barnið varð lekt frá sjálvum tí tíma.

19 Tá komu lærusveinarnir til Jesu burturifrá, og søgdu, Hví kundu ikki vit kasta hann út?

20 Og Jesus segði við teir, Uppá grund av tykkara vantrúgv: tí at sanniliga sigi eg tykkum, Um tit havi trúgv sum eitt sinopskorn, skulu tit siga við hetta fjallið, Burtflyt hiðani til hatta staðið; og tað skal burtflyta; og einkið skal vera ógjørligt fyri tykkum.

21 Hvussu enn er, hetta slagið fer ikki út uttan við^ bøn og føstu.

22 ¶ Og meðan teir dvaldu í Galilēu, segði Jesus við teir, Menniskjusonurin skal verða svikin inn í mannahendur:

23 Og teir skulu drepa hann, og hin triðja dagin skal hann verða reistur aftur. Og teir vórðu avbera syrgnir.

24 ¶ Og tá ið teir vóru komnir til Că-pĕr´-nă-ŭm, komu teir sum tóku ímóti íkasts*peningi* til Pæturs, og søgdu, Rindar ikki tykkara meistari íkast?

25 Hann sigur, Jú. Og tá ið hann var komin inn í húsið, var Jesus fyrri á enn hann, sigandi, Hvat heldurt tú, Símun? av hvørjum taka kongar jarðarinnar toll ella íkast? av sínum egnu børnum, ella av fremmandum?

26 Pætur sigur við hann, Av fremmandum. Jesus sigur við hann, So eru børnini frí.

27 Hóast hetta, at ikki vit skuldu volt teim meinboga, far tú til havsins, og kasta ein húk, og tak upp fiskin sum fyrst kemur upp; og tá ið tú hevurt opnað munnin á honum, skalt tú finna eitt pengastykki: tað tak, og gev teimum fyri meg og teg.

KAPITUL 18

UM hina somu tíð komu lærusveinarnir til Jesu, sigandi, Hvør er hin størsti í kongadømi himins?

2 Og Jesus kallaði eitt lítið barn til sín, og setti hann í miðju teirra,

3 Og segði, Sanniliga sigi eg tykkum, Uttan tit verði umvendir, og gerist eins og lítil børn, skulu tit ikki ganga inn í kongadømi himins.

4 Hvørsumhelst *ið* tí skal eyðmýkja seg sjálvan eins og hetta lítla barnið, hin sami er størstur í kongadømi himins.

5 Og hvør*ið*so skal taka ímóti einum slíkum lítlum barni í navni mínum, tekur ímóti mær.

6 Men hvør*ið*so skal geva einum av hesum smáu, sum trúgva á meg, meinboga, tað var betri hjá honum, at ein mylnusteinur varð hongdur um háls hansara, og *at* hann varð druknaður í havsins djúp.

7 ¶ Vei heiminum uppá grund av meinbogum! tí at tað má neyðugt verða, at meinbogar koma; men vei tí manni, við` hvørjum meinbogin kemur!

8 Hvørsvegna um hond tín ella fótur tín gevi tær meinboga, sker tey av, og kasta *tey* frá tær: tað er betri hjá tær at ganga inn til lívs haltur ella vanførur, heldur enn havandi tvær hendur ella tveir føtur at verða kastaður inn í ævigtvarandi eld.

9 Og um eyga títt gevi tær meinboga, slít tað úr, og kasta *tað* frá tær: tað er betri hjá tær at ganga inn til lívs við ēinum eyga, heldur enn havandi tvey eygu at verða kastaður inn í hel-eld.

10 Ansið eftir, at tit vanviríði ikki ēitt av hesum smáu; tí at eg sigi tykkum, At í himni skoða einglar teirra altíð andlit Faðirs míns sum er í himni.

11 Tí at Menniskjusonurin er komin at frelsa tað sum var burturvilst.

12 Hvussu hugsa tit? um ein maður havi hundrað seyðir, og ēin av teimum veri farin á strok, fer hann ikki frá teimum níggju og níti, og fer niðan í fjøllini, og leitar eftir tí sum er farin á strok?

13 Og um so verði at hann finni hann, sanniliga sigi eg tykkum, hann fegnast meira um tann *seyðin,* enn um teir níggju og níti sum fóru ikki á strok.

14 Enntá soleiðis er tað ikki vilji Faðirs tykkara, sum er í himni, at ēitt av hesum smáu skuldu glatast.

15 ¶ Harafturat um bróðir tín skal misbrótast ímóti tær, far og sig honum hansara feil ímillum teg og hann einsamallar: um hann skal hoyra teg, hevurt tú vunnið bróður tín.

16 Men um hann vilji ikki hoyra *teg, tá* tak við tær ēin ella tveir afturat, at við munninum á tveimum ella trimum vitnum hvørt orð má verða grundfest.

17 Og um hann skal vansketta at hoyra teir, sig *tað* við kirkjuna: men um hann vansketti at hoyra kirkjuna, lat hann vera tær sum ein heiðin maður og ein tollari.

18 Sanniliga sigi eg tykkum, Hvatsumhelst *ið* tit skulu binda á jørð, skal vera bundið í himni: og hvatsumhelst *ið* tit skulu loysa á jørð, skal vera loyst í himni.

19 Aftur sigi eg tykkum, At um tveir av tykkum skulu vera samdir á jørð, hvat varðar nakað ting sum teir skulu umbiða, tað skal verða gjørt fyri teir av Faðir mínum sum er í himni.

20 Tí at hvar *sum* tveir ella tríggir eru savnaðir saman í mínum navni, har eri eg í teirra mittu.

21 ¶ Tá kom Pætur til hansara, og segði, Harri, hvussu ofta skal bróður mín synda ímóti mær, og eg fyrigeva honum? til sjey ferðir?

22 Jesus sigur við hann, Eg sigi tær ikki, Inntil sjey ferðir: men, Inntil sjeyti ferðir sjey.

23 ¶ Tessvegna er kongadømi himins líknað við ein ávísan kong, sum vildi taka roknskap av tænarum sínum.

24 Og tá ið hann var byrjaður at rokna, varð ēin fordur til hansara sum skyldaði honum tíggju túsund talentir.

25 Men við tað at hann hevði ikki at gjalda, beyð harri hansara hann at verða seldan, og hansara konu, og børn, og alt sum hann hevði, og rindan at verða inta.

26 Tænarin tessvegna fell niður, og tilbað hann, sigandi, Harri, hav tol við mær, og eg vil rinda tær alt.

27 Tá varð harrin hjá tí tænara rørdur við várkunn, og loysti hann, og fyrigav honum skuldina.

28 Men hin sami tænarin fór út, og fann ēin av samtænarum sínum, sum skyldaði honum hundrað denarar: og hann legði hendur á hann, og tók *hann* eftir svíranum, sigandi, Rinda mær tað tú skyldart.

29 Og hansara samtænari fell niður við hansara føtur, og bønaði hann, sigandi, Hav tol við mær, og eg vil rinda tær alt.

30 Og hann vildi ikki: men fór og kastaði hann inn í fongsul, til hann skuldi rinda skuldina.

31 So tá ið hansara samtænarar sóu hvat var gjørt, vórðu teir sera syrgnir, og komu og søgdu harra sínum alt sum var gjørt.

32 Harri hansara, eftir at hann hevði kallað hann, tá segði við hann, O tú vondi tænari, eg fyrigav tær alla hasa skuldina, av tí at tú tráaðirt meg:

33 Skuldirt ikki tú eisini hava havt várkunn við samtænara tínum, enntá sum eg tók synd í tær?

34 Og harri hansara varð vreiður, og gav hann yvir til pínslaranna, til hann skuldi rinda alt sum honum var skyldugt.

35 So líkaleiðis skal himinski Faðir mín gera eisini við tykkum, um tit frá tykkara hjørtum fyrigevi ikki hvør *og* ēin bróður sínum misbrotini hjá teimum.

KAPITUL 19

OG tað bar á, *at* tá ið Jesus hevði endað hesar framsagnir, fór hann avstað frá Galilēu, og kom inn í breddarnar av Judæu handanfyri Jordan;

2 Og miklar mannfjøldir fylgdu honum; og hann grøddi tey har.

3 ¶ Pharisēararnir eisini komu til hansara, freistandi hann, og sigandi við hann, Er tað lógligt hjá einum manni at koyra burtur konu sína fyri hvørja grund?

4 Og hann svaraði og segði við teir, Hava tit ikki lisið, at hann sum gjørdi *tey* við byrjanina, gjørdi tey kall og kallinnu,

5 Og segði, Av hesi grund skal maður fara frá faðir og móður, og skal krøkja *seg* at síni konu: og tey tvey skulu vera ēitt kjøt?

6 Hvørsvegna tey eru ei meira tvey, men ēitt kjøt. Hvat tí Guð hevur saman komið, lat ikki mann koyra sundur.

7 Teir siga við hann, Hví beyð tá Móses at geva henni skilnaðarskriv, og at koyra hana burtur?

8 Hann sigur við teir, Móses uppá grund av harðleikanum av tykkara hjørtum loyvdi tykkum at koyra burtur konur tykkara: men frá byrjanini var tað ikki so.

9 Og eg sigi við tykkum, Hvørsumhelst *ið* skal koyra burtur konu sína, undantikið *um tað veri* fyri siðloysi, og skal giftast við eini aðrari, fremur hordóm: og hvør*ið*so giftist við henni sum er koyrd burtur, fremur hordóm.

10 ¶ Hansara lærusveinar siga við hann, Um viðurskifti mansins veri soleiðis við konu *hansara, so* er tað ikki gott at giftast.

11 Men hann segði við teir, Allir *menn* kunnu ikki taka við hesi framsøgn, uttan *teir,* til hvørja tað er givið.

12 Tí at tað eru summir geldingar, sum vórðu soleiðis føddir frá

móðurlívi móður *sínar:* og tað eru summir geldingar, sum vórðu gjørdir geldingar av monnum: og tað veri geldingar, sum hava gjørt seg *til* geldingar fyri kongadømis himins skuld. Hann, ið er førur fyri at taka við *tí,* lat hann taka við *tí*.

13 ¶ Tá vórðu førd til hansara smá børn, at hann skuldi leggja hendur *sínar* á tey, og biðja: og lærusveinarnir hartaðu tey.

14 Men Jesus segði, Loyvið lítlum børnum, og sýtið teimum ikki, at koma til mín: tí at slíkra er kongadømi himins.

15 Og hann legði hendur *sínar* á tey, og fór avstað haðani.

16 ¶ Og sí, ēin kom og segði við hann, Góði Meistari, hvat gott ting skal eg gera, at eg má hava ævigt lív?

17 Og hann segði við hann, Hví kallart tú meg góðan? *tað er* eingin góður uttan ēin, *tað er,* Guð: men um tú vilt ganga inn til lívs, halt boðini.

18 Hann sigur við hann, Hvørji? Jesus segði, Tú skalt einkið morð inna, Tú skalt ikki fremja hordóm, Tú skalt ikki stjala, Tú skalt ikki bera falskan vitnisburð,

19 Æra faðir tín og móður *tína:* og, Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg.

20 Tann ungi maðurin sigur við hann, Øll hesi ting havi eg hildið frá mínum ungdómi upp*eftir:* hvat vantar mær enn?

21 Jesus segði við hann, Um tú vilt vera fullkomin, far *og* sel tað tú hevurt, og gev til tey fátæku, og tú skalt hava dýrgrip í himni: og kom *og* fylg mær.

22 Men tá ið tann ungi maðurin hoyrdi ta framsøgnina, fór hann syrgin burtur: tí at hann hevði miklar ognir.

23 ¶ Tá segði Jesus við lærusveinar sínar, Sanniliga sigi eg tykkum, At ein ríkur maður skal treyðugligani innfara inn í kongadømi himins.

24 Og aftur sigi eg tykkum, Tað er lættari hjá einum kameli at fara ígjøgnum eitt nálareyga, enn hjá einum ríkum manni at innfara inn í kongadømi Guðs.

25 Tá ið hansara lærusveinar hoyrdu *tað,* vórðu teir ógvuliga ógvaðir, sigandi, Hvør tá kann verða frelstur?

26 Men Jesus eygleiddi *teir,* og segði við teir, Við monnum, hetta er ógjørligt; men við Guði øll ting eru gjørlig.

27 ¶ Tá tók Pætur til orða og segði við hann, Sí, vit eru farnir frá øllum, og *hava* fylgt tær; hvat skulu vit hava harfyri?

28 Og Jesus segði við teir, Sanniliga sigi eg tykkum, At tit, sum hava fylgt mær, í endurføðingini, tá ið Menniskjusonurin skal sita í hásætinum av síni dýrd, skulu tit eisini sita uppiá tólv hásætum, dømandi hinar tólv ættir Ísraels.

29 Og hvør tann sum er farin frá húsum, ella brøðrum, ella systrum, ella faðir, ella móður, ella konu, ella børnum, ella jørðum, fyri navns míns skuld, skal móttaka hundraðfalt *aftur,* og skal arva ævigtvarandi lív.

30 Men mangir, *sum eru* fyrstir, skulu verða síðstir; og hinir síðstu *skulu verða* fyrstir.

KAPITUL 20

TÍ at kongadømi himins er líkt einum manni *sum er* ein húsbóndi, sum fór út árla um morgunin at leiga arbeiðsmenn inn í víngarð sín.

2 Og tá ið hann var komin ásamt við arbeiðsmenninar um ein denar um dagin, sendi hann teir inn í víngarð sín.

3 Og hann fór út umkring hin triðja tíman, og sá aðrar standandi fyri einkið á torginum,

4 Og segði við teir; Farið tit eisini inn í víngarðin, og hvatsumhelst *ið* rætt er vil eg geva tykkum. Og teir fóru leið sína.

5 Aftur fór hann út umkring hin sætta og níggjunda tíman, og gjørdi líkaleiðis.

6 Og kring hin ellivta tíman fór hann út, og fann aðrar standandi fyri einkið, og sigur við teir, Hví standa tit her allan dagin fyri einkið?

7 Teir siga við hann, Av tí at eingin maður hevur leigað okkum. Hann sigur við teir, Farið tit eisini inn í víngarðin; og hvatsumhelst *ið* rætt er, *tað* skulu tit fáa.

8 So tá ið kvøld var komið, sigur harrin av víngarðinum við húsleiðara sín, Kalla arbeiðsmenninar, og gev teim hýru *teirra,* byrjandi frá tí síðsta at hinum fyrsta.

9 Og tá ið teir komu, sum *vórðu leigaðir* kring hin ellivta tíman, fingu teir hvør maður ein denar.

10 Men tá ið teir fyrstu komu, hildu teir at teir skuldu havt fingið meira; og teir somuleiðis fingu hvør maður ein denar.

11 Og tá ið teir høvdu fingið *hann,* knarraðu teir inná húsbónda hússins,

12 Sigandi, Hesir síðstu hava virkað *bert* ein tíma, og tú hevurt gjørt teir javnlíkar okkum, sum hava borið byrði og hita dagsins.

13 Men hann svaraði einum av teimum, og segði, Vinur, eg geri tær ongan órætt: samdirst tú ikki við meg um ein denar?

14 Tak *tað ið* títt *er,* og far tín veg: eg vil geva hesum síðsta, enntá eins og tær.

15 Er tað ikki lógligt hjá mær at gera hvat eg vil við mítt egna? Er eyga títt ónt, av tí at eg eri góður?

16 Soleiðis skulu hinir síðstu verða fyrstir, og hinir fyrstu síðstir: tí at mangir veri kallaðir, men fáir útvaldir.

17 ¶ Og Jesus, farandi niðan til Jerusalem, tók teir tólv lærusveinarnar ēinsæris á veginum, og segði við teir,

18 Sí, vit fara niðan til Jerusalem; og Menniskjusonurin skal verða svikin hinum fremstu prestunum og skriftlærdu, og teir skulu dómfella hann til deyða,

19 Og skulu geva hann yvir til Heidninganna at háða, og at húðfletta, og at krossfesta *hann:* og hin triðja dagin skal hann rísa aftur.

20 ¶ Tá komu til hansara móðirin at Zĕb-ĕ-dēē´-ūs-ar børnum við sonum sínum, tilbiðjandi *hann,* og tráandi eitt ávíst ting av honum.

21 Og hann segði við hana, Hvat vilt tú? Hon sigur við hann, Veit, at hesir báðir synir mínir mega sita, tann ēini við tína høgru hond, og hīn við ta vinstru, í kongadømi tínum.

22 Men Jesus svaraði og segði, Tit vita ikki hvat tit umbiðja. Eru tit mentir at drekka úr bikarinum sum eg skal drekka úr, og at verða doyptir við dópinum sum eg eri doyptur við? Teir siga við hann, Vit eru mentir.

23 Og hann sigur við teir, Tit skulu vist drekka úr bikari mínum, og verða doyptir við dópinum sum eg eri doyptur við: men at sita við høgru hond mína, og við mína vinstru, er ikki mítt at geva, men *tað skal verða givið til teirra,* fyri hvørjar tað er fyribúgvið av Faðir mínum.

24 Og tá ið teir tíggju hoyrdu *tað,* vórðu teir rørdir við harmavreiði inná teir báðar brøðurnar.

25 Men Jesus kallaði teir *til sín,* og segði, Tit vita, at prinsarnir hjá Heidningunum útinna harradømi yvir teir, og teir, sum eru miklir, útinna myndugleika uppá teir.

26 Men tað skal ikki vera soleiðis tykkara millum: men hvørsumhelst *ið* vil vera mikil tykkara millum, lat hann vera tænari tykkara;

27 Og hvørsumhelst *ið* vil vera hægstur tykkara millum, lat hann vera sveinur tykkara:
28 Enntá sum Menniskjusonurin kom ikki at verða tæntur yvirfyri, men at tæna, og at geva sítt lív — eitt loysigjald fyri mangar.
29 Og, sum teir fóru avstað frá Jericho, fylgdi ein mikil mannamúgva honum.
30 ¶ Og sí, tveir blindir menn, sitandi við vegkantin, tá ið teir hoyrdu at Jesus fór framvið, rópaðu út, sigandi, Hav miskunn yvir okkum, O Harri, *tú* Sonur Dávids.
31 Og mannamúgvan hartaði teir, av tí at teir skuldu halda friði sínum: men teir rópaðu jú meira, sigandi, Hav miskunn yvir okkum, O Harri, *tú* Sonur Dávids.
32 Og Jesus stóð stillur, og kallaði teir, og segði, Hvat vilja tit, at eg skal gera tykkum?
33 Teir siga við hann, Harri, at okkara eygu mega verða opnaði.
34 So Jesus hevði várkunn *yvir teir,* og nam við eygu teirra: og í stundini fingu eygu teirra sjón, og teir fylgdu honum.

KAPITUL 21

OG tá ið teir nærkaðust Jerusalem, og vóru komnir til Bëth-phá-gê, at Olivinfjallinum, tá sendi Jesus tveir lærusveinar,
2 Sigandi við teir, Farið inn í bygdina yvir av tykkum, og beinanvegin skulu tit finna ein asna bundnan, og eitt fyl hjá˝ tí: loysið *tey,* og førið *tey* til mín.
3 Og um nakar *maður* sigi okkurt við tykkum, skulu tit siga, Harrin hevur tørv á teimum; og beinanvegin vil hann senda tey.
4 Alt hetta varð gjørt, at tað mátti verða uppfylt, sum varð talað viðˆ prophetinum, sigandi,
5 Sigið tit dóttur Sí-ön-s, Sí, Kongur tín til tín kemur, eyðmjúkur, og sitandi uppiá einum asna, og einum asnarfyli — fylinum hjá einum asna.
6 Og lærusveinarnir fóru, og gjørdu sum Jesus beyð teimum,
7 Og komu við asnanum, og fylinum, og løgdu klæðir síni á tey, og teir settu *hann* hará.
8 Og ein sera mikil mannamúgva breiddi klæðir síni á vegin; onnur skóru niður greinar av trøunum, og stroyddu *tær* á vegin.
9 Og mannamúgvurnar sum fóru undan, og sum fylgdu, rópaðu, sigandi, Hō-sän-nä til Sonar Dávids: Vælsignaður *er* hann, sum kemur í navni Harrans; Hō-sän-nä í tí hægsta.
10 Og tá ið hann var komin inn í Jerusalem, varð allur staðurin rørdur, sigandi, Hvør er hesin?
11 Og mannamúgvan segði, Hetta er Jesus, propheturin úr Nazareth av Galilëu.
12 ¶ Og Jesus fór inn í tempul Guðs, og kastaði út allar teir sum seldu og keyptu í templinum, og koyrdi um koll borðini hjá peningavekslarunum, og sessirnar hjá teimum ið seldu dúgvur,
13 Og segði við teir, Skrivað stendur, Hús mítt skal verða kallað bønarhúsið; men tit hava gjørt tað *til* eitt ránsmannaból.
14 Og tey blindu og tey lamnu komu til hansara í templinum; og hann grøddi tey.
15 Og tá ið teir fremstu prestarnir og skriftlærdu sóu tey undurfullu tingini sum hann gjørdi, og børnini rópandi í templinum, og sigandi, Hō-sän-nä til Sonar Dávids; *tá* vórðu teir sára misnøgdir,
16 Og søgdu við hann, Hoyrirt tú hvat hesi siga? Og Jesus sigur við teir, Ja; hava tit aldri lisið, Út úr munninum á pinkubørnum og bróstabørnum hevurt tú fullkomingjørt *lov*prís*an?*

17 ¶ Og hann fór frá teimum, og fór út úr staðinum inn í Bethaniu; og hann helt til har.
18 Nú, um morgunin, sum hann kom aftur inn í staðin, hungraði hann.
19 Og tá ið hann sá eitt fikutræ á veginum, kom hann til tað, og fann einkið hará, men bløð einans, og segði við tað, Lat ongan ávøkst vaksa á tær hiðanframeftir um ævir. Og í stundini følnaði fikutræið burtur.
20 Og tá ið lærusveinarnir sóu *tað,* undraðust teir, sigandi, Hvør skjótt er fikutræið følnað burtur!
21 Jesus svaraði og segði við teir, Sanniliga sigi eg tykkum, Um tit havi trúgv, og ivist ei, skulu tit ikki einans gera hetta *sum gjørt er* við fikutræið, men eisini um tit skulu siga við hetta fjallið, Veri tú burtflutt, og veri tú kastað inn í havið; tað skal verða gjørt.
22 Og øll ting, hvørjisumhelst *ið* tit skulu umbiðja í bøn, trúgvandi, tit skulu fáa *tey*.
23 ¶ Og tá ið hann var komin inn í templið, komu teir fremstu prestarnir og hinir elstu fólksins at honum, sum hann frálærdi, og søgdu, Við hvørjum myndugleika gert tú hesi tingini? og hvør gav tær henda myndugleika?
24 Og Jesus svaraði og segði við teir, Eg eisini vil spyrja tykkum ēitt ting, sum, um tit sigi mær, vil eg á líkan hátt siga tykkum, við hvørjum myndugleika eg geri hesi tingini.
25 Dópur Jóhannesar, hvaðani var hann? frá himni, ella av monnum? Og teir umhugsaðu *seg* við sær sjálvum, sigandi, Um vit skulu siga, Frá himni; vil hann siga við okkum, Hví trúðu tit honum tá ikki?
26 Men um vit skulu siga, Av monnum; óttast vit fólkið; tí at øll halda Jóhannes sum ein prophet.
27 Og teir svaraðu Jesusi, og søgdu, Vit kunnu ikki siga. Og hann segði við teir, Eiheldur sigi eg tykkum, við hvørjum myndugleika eg geri hesi tingini.
28 ¶ Men hvat halda tit? Ein *ávísur* maður hevði tveir synir; og hann kom til hin fyrra, og segði, Sonur, far og virka í dag í víngarði mínum.
29 Hann svaraði og segði, Eg vil ikki: men síðan iðraði hann *seg,* og fór.
30 Og hann kom til hin seinna, og segði somuleiðis. Og hann svaraði og segði, Eg *fari,* harri: og fór ikki.
31 Hvør av teimum báðum gjørdi vilja faðirs *síns?* Teir siga við hann, Hin fyrri. Jesus sigur við teir, Sanniliga sigi eg tykkum, At tollararnir og skøkjurnar fara inn í kongadømi Guðs undan tykkum.
32 Tí Jóhannes kom til tykkara á rættvísis-veginum, og tit trúðu honum ikki: men tollararnir og skøkjurnar trúðu honum: og tit, tá ið tit høvdu sæð *tað,* vendu ikki um aftaná, at tit máttu trúð honum.
33 ¶ Hoyrið eina aðra dømisøgu: Tað var ein ávísur húsbóndi, sum plantaði ein víngarð, og girdi hann runt umkring, og gróv eina vínpersu í honum, og bygdi eitt torn, og leigaði hann út til víngarðsmanna, og fór inn í eitt fjarlagið land:
34 Og tá ið fruktartíðin nærkaðist, sendi hann tænarar sínar til víngarðsmannanna, at teir máttu taka ímóti ávøkstunum av honum.
35 Og víngarðsmenninir tóku tænarar hansara, og bardu ēin, og drópu ein annan, og steinaðu ein annan.
36 Aftur sendi hann aðrar tænarar, fleiri enn teir fyrstu: og teir gjørdu við teir líkaleiðis.

37 Men síðst av øllum sendi hann til teir son sín, sigandi, Teir vilja hava virðing fyri syni mínum.
38 Men tá ið víngarðsmenninir sóu sonin, søgdu teir sín ámillum, Hetta er arvingin; komið, latum okkum drepa hann, og latum okkum leggjast á arv hansara.
39 Og teir fangaðu hann, og kastaðu *hann* út úr víngarðinum, og banaðu *honum*.
40 Tá ið tí harrin av víngarðinum kemur, hvat vil hann gera við hasar víngarðsmenninar?
41 Teir siga við hann, Hann vil herviliga oyðileggja hasar vondu menninar, og vil leiga út øðrum víngarðsmonnum víngarð *sín,* sum skulu veita honum ávøkstirnar í tíðum sínum.
42 Jesus sigur við teir, Lósu tit aldri í skriftunum, Steinurin, sum smiðirnir vrakaðu, hin sami er vorðin høvuðs horn*steinurin:* hetta er gerningur Harrans, og tað er undrunarvert í eygum várum?
43 Tí sigi eg tykkum, Kongadømi Guðs skal verða tikið frá tykkum, og givið til eina tjóð, sum ber fram tess ávøkstir.
44 Og hvørsumhelst *ið* skal falla á henda stein, skal verða soraður: men á hvønnsumhelst *ið* hann skal falla, hann vil mylja hann í støv.
45 Og tá ið teir fremstu prestarnir og Pharisëararnir høvdu hoyrt hansara dømisøgur, varnaðust teir at hann talaði um teir.
46 Men tá ið teir søktu at leggja hendur á hann, óttaðust teir mannfjøldina, av tí at tey tóku hann fyri ein prophet.

KAPITUL 22

OG Jesus tók til orða og talaði til teirra aftur við^ dømisøgum, og segði,
2 Kongadømi himins er líkt einum ávísum kongi, sum gjørdi eitt brúdleyp fyri syni sínum,
3 Og sendi fram sínar tænarar at kalla teir, sum vórðu bodnir, til brúdleypið: og teir vildu ikki koma.
4 Aftur sendi hann fram aðrar tænarar, sigandi, Sigið teimum sum eru bodnir, Sí, eg havi fyrireikað máltíð mína: mínir oksar og *mínir* gøðingar*kálvar eru* dripnir, og øll ting *eru* tilreiðar: komið í brúdleypið.
5 Men teir hildu hánt um *tað,* og fóru vegir sínar, ëin í garð sín, ein annar í handil sín:
6 Og leivdin tók tænarar hansara, og fór illviljandi við *teimum,* og vó *teir.*
7 Men tá ið kongurin frætti *um hetta,* varð hann vreiður: og hann sendi fram síni herlið, og oyddi hasar myrðararnar, og brendi upp stað teirra.
8 Tá sigur hann við tænarar sínar, Brúdleypið er tilreiðar, men teir, sum vórðu bodnir, vóru ikki verdigir.
9 Farið tit tí út á alfaravegirnar, og so mongum, sum tit skulu hitta, bjóðið til brúdleypið.
10 So teir tænararnir fóru út á alfaravegirnar, og savnaðu saman allar, so mangar sum teir funnu, bæði ringar og góðar: og brúdleypið varð búgvið við gestum.
11 ¶ Og tá ið kongurin kom inn at síggja gestirnar, sá hann har ein mann sum var ikki ílatin eitt brúdleypsklæði:
12 Og hann sigur við hann, Vinur, hvussu komst tú inn higar, ei havandi eitt brúdleypsklæði? Og hann var málbundin.
13 Tá segði kongurin við tænararnar, Bindið hann hond og fót, og takið hann burtur, og kastið *hann* inn í ytra myrkur; har skal vera grátur og tannagrísl.
14 Tí at mangir eru kallaðir, men fáir *eru* útvaldir.
15 ¶ Tá fóru Pharisëararnir,

og hildu ráð, hvussu teir máttu fløkt hann í talu *hansara*.

16 Og teir sendu út til hansara sínar lærusveinar við Hĕ-ró´-dĭ-ăr-unum, sigandi, Meistari, vit vita at tú ert sannur, og lærirt veg Guðs í sannleika, eiheldur leggurt tú í nakran *mann:* tí at tú gevurt ikki gætur eftir persónum manna.

17 Sig okkum tessvegna, hvat meinart tú? Er tað lógligt at lata Cæsari íkast, ella ikki?

18 Men Jesus varnaðist teirra vondsku, og segði, Hví freista tit meg, *tykkara* hyklarar?

19 Sýnið mær íkastspeningin. Og teir fingu honum ein denar.

20 Og hann sigur við teir, Hvørs mynd og áskrift *er* hetta?

21 Teir siga við hann, Cæsars. Tá sigur hann við teir, Rindið tí Cæsari tingini sum eru Cæsars; og Guði tingini sum eru Guðs.

22 Tá ið teir høvdu hoyrt *hesi orðini,* undraðust teir, og fóru frá honum, og fóru sín veg.

23 ¶ Hin sama dagin komu til hansara Săd-dû-cē´-ararnir, sum siga at tað er eingin uppreisn, og spurdu hann,

24 Sigandi, Meistari, Móses segði, Um ein maður doyggi, havandi eingi børn, *so* skal bróður hansara giftast við konu hansara, og reisa upp bróður sínum sáð.

25 Nú, tað vóru hjá okkum sjey brøður: og hin fyrsti, tá ið hann hevði gift *seg* við eini konu, andaðist, og, havandi einkið avkom, eftirlæt bróður sínum konu sína:

26 Somuleiðis hin annar eisini, og hin triðji, at hinum sjeynda.

27 Og síðst av øllum doyði kvinnan eisini.

28 Tessvegna í uppreisnini, hvørs kona skal hon vera av teimum sjey? tí at teir allir høvdu hana.

29 Jesus svaraði og segði við teir, Tit fara skeivir, ei kennandi skriftirnar, eiheldur Guðs mátt.

30 Tí at í uppreisnini hvørki giftast tey, ella verða givin í giftu, men eru eins og einglar Guðs í himni.

31 Men hvat varðar uppreisnina av teimum deyðu, hava tit ikki lisið tað sum varð talað til tykkara av Guði, sigandi,

32 Eg eri Guð Ábrahams, og Guð Ísaaks, og Guð Jákobs? Guð er ikki Guð teirra deyðu, men teirra livandi.

33 Og tá ið mannfjøldin hoyrdi *hetta,* vórðu tey ovfarin yvir Guðslæru hansara.

34 ¶ Men tá ið Pharisēararnir høvdu hoyrt, at hann hevði tept Săd-dû-cē´-ararnar, vóru teir savnaðir saman.

35 Ein av teimum, *sum var* ein lógkønur, spurdi *hann* tá *ein spurning,* freistandi hann, og sigandi,

36 Meistari, hvørt *er* hitt stóra boðið í lógini?

37 Jesus segði við hann, Tú skalt elska Harran Guð tín við øllum hjarta tínum, og við allari sál tíni, og við øllum huga tínum.

38 Hetta er hitt fyrsta og stóra boðið.

39 Og hitt annað *er* líkt tí, Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg.

40 Á hesum báðum boðum hongur øll lógin og prophetarnir.

41 ¶ Meðan Pharisēararnir vóru savnaðir saman, spurdi Jesus teir,

42 Sigandi, Hvat halda tit um Christ? hvørs sonur er hann? Teir siga við hann, *Sonur* Dávids.

43 Hann sigur við teir, Hvussu kallar tá Dávid hann í anda Harra, sigandi,

44 HARRIN segði við Harra mín, Sit tú við høgru hond mína, til eg geri tínar figgindar *til* fótskammul tín?

45 Um Dávid tá kalli hann Harra, hvussu er hann sonur hansara?

46 Og eingin maður var førur fyri at svara honum eitt orð, eiheldur tordi nakar *maður* frá tí degi fram *at* spyrja hann nakrar fleiri *spurningar.*

KAPITUL 23

TÁ talaði Jesus til mannfjøldarinnar, og til lærusveina sína,
2 Sigandi, Hinir skriftlærdu og Pharisēarnir sita í stóli Mósesar:
3 Øllum, tessvegna, hvørjumsumhelst *ið* teir bjóða tykkum at geva ans, *tí* gevið ans og *tað* gerið; men gerið ikki tit eftir verkum teirra: tí at teir siga, og gera ikki.
4 Tí at teir binda tungar byrðar og svárligar at verða bornar, og leggja *tær* á herðarnar hjá monnum; men teir *sjálvir* vilja ikki flyta tær við ēinum fingri sínum.
5 Men øll síni verk gera teir fyri at verða sæddir av monnum: teir gera breiðar sínar minnisreimar, og vaksa um kantarnar á klæðum sínum,
6 Og elska hini ovastu sætini í veitslum, og hinar fremstu sessir í sýnagogunum,
7 Og heilsanir á torgunum, og at verða kallaðir av monnum, Rabbī, Rabbī.
8 Men verðið ikki tit kallaðir Rabbī: tí at ēin er Meistari tykkara, *enntá* Christus; og allir tit eru brøður.
9 Og kallið ongan *mann* tykkara faðir uppiá jørðini: tí at ēin er Faðir tykkara, sum er í himni.
10 Eiheldur verðið tit kallaðir meistarar: tí at ēin er Meistari tykkara, *enntá* Christus.
11 Men hann, sum er størstur tykkara millum, skal vera tænari tykkara.
12 Og hvørsumhelst *ið* skal upphevja seg sjálvan, skal verða lækkaður; og hann ið skal eyðmýkja seg sjálvan, skal verða upphevjaður.
13 ¶ Men vei tykkum, skriftlærdum og Pharisēarum, hyklarum! tí at tit lata aftur kongadømi himins ímóti monnum: tí at tit hvørki ganga inn *sjálvir,* eiheldur loyva tit teimum, ið eru farandi inn, at fara inn.
14 Vei tykkum, skriftlærdum og Pharisēarum, hyklarum! tí at tit oyðeta húsini hjá einkjum, og á kvamsvís halda langa bøn: tí skulu tit fáa tess størri heldøming.
15 Vei tykkum, skriftlærdum og Pharisēarum, hyklarum! tí at tit ferðast um sjógv og land fyri at gera ēin trúskifting, og tá ið hann er gjørdur, gera tit hann *til* tvífalt meiri helvitis barnið enn tit sjálvir.
16 Vei tykkum, *tykkara* blindu vegleiðarar, sum siga, Hvørsumhelst *ið* skal svørja við templið, tað er einkið; men hvørsumhelst *ið* skal svørja við gull tempulsins, hann er ein skuldnari!
17 *Tykkara* dárar og blindu: tí at hvørt er størri, gullið, ella templið sum halgar gullið?
18 Og, Hvørsumhelst *ið* skal svørja við altarið, tað er einkið; men hvørsumhelst *ið* svør við gávuna sum er uppiá tí, hann er sekur.
19 *Tykkara* dárar og blindu: tí at hvørt *er* størri, gávan, ella altarið sum halgar gávuna?
20 Hvør*ið*so tí skal svørja við altarið, svør við tað, og við øll ting hará.
21 Og hvør*ið*so skal svørja við templið, svør við tað, og við hann sum býr harí.
22 Og hann ið skal svørja við himin, svør við hásæti Guðs, og við hann ið situr hará.
23 Vei tykkum, skriftlærdum og Pharisēarum, hyklarum! tí at tit gjalda tíggjund av myntu og dild og kumman, og hava útilatið hini tyngru *málsevnir* lógarinnar, dóm, miskunn, og trúgv: hesi áttu tit at hava gjørt, og ikki at latið hini eftir ógjørd.

24 *Tykkara* blindu vegleiðarar, sum síla eftir einum myggjabita, og gloypa einum kameli.

25 Vei tykkum, skriftlærdum og Pharisēarum, hyklarum! tí at tit gera reina útsíðuna av bikarinum og fatinum, men innaní eru tey full av peninganoyðslu og óhógvi.

26 *Tín* blindi Pharisēari, reinsa fyrst tað *sum er* innan í bikarinum og fatinum, at útsíðan á teimum má verða rein eisini.

27 Vei tykkum, skriftlærdum og Pharisēarum, hyklarum! tí at tit eru líkir kálkaðum gravhýsum, sum víst sýnast vøkur útvortis, men eru innan full av deyðra*manna*beinum, og av allari óreinsku.

28 Enntá soleiðis eisini sýnast tit rættvísir yvirfyri monnum útvortisliga, men innan eru tit fullir av hykli og misgerð.

29 Vei tykkum, skriftlærdum og Pharisēarum, hyklarum! av tí at tit byggja gravirnar hjá prophetunum, og prýða gravhýsini hjá teimum rættvísu,

30 Og siga, Um vit høvdu verið *uppi* á døgum fedra vára, høvdu vit ikki verið luttakarar við teimum í blóðinum av prophetunum.

31 Hvørsvegna tit eru tykkum sjálvum vitnir, at tit eru børnini at teimum ið drópu prophetarnar.

32 Fyllið tit tá upp mátið hjá fedrum tykkara.

33 *Tykkara* høggormar, *tykkara* avkom av eiturormum, hvussu kunnu tit komast undan heldøming helvitis?

34 ¶ Hvørsvegna, sí, eg sendi tykkum prophetar, og vísmenn, og skriftlærdar: og *summar* av teimum skulu tit drepa og krossfesta; og *summar* av teimum skulu tit húðfletta í sýnagogum tykkara, og søkja at *teimum* frá staði til staðar:

35 At uppá tykkum má koma alt tað rættvísa blóðið, úthelt uppá jørðina, frá blóði rættvísa Ábels at blóði Zächarías-ar sonar Barachías-ar, hvønn tit vógu ímillum templið og altarið.

36 Sanniliga sigi eg tykkum, Allir hesir lutir skulu koma omanyvir hesa ætt.

37 O Jerusalem, Jerusalem, *tú* sum drepurt prophetarnar, og steinart teir sum eru sendir til tín, hvør ofta vildi eg havt savnað børn tíni saman, enntá sum ein høna savnar ungar sínar undir veingir *sínar,* og tit vildu ikki!

38 Sí, tykkara hús verður eftirlatið tykkum oyði.

39 Tí at eg sigi tykkum, Tit skulu ikki síggja meg hiðanífrá, fyrrenn tit skulu siga, Vælsignaður *er* hann sum kemur í navni Harrans.

KAPITUL 24

OG Jesus fór út, og fór avstað frá templinum: og hansara lærusveinar komu til *hansara* fyri at sýna honum bygningarnar av templinum.

2 Og Jesus segði við teir, Síggja tit ikki øll hesi tingini? sanniliga sigi eg tykkum, Tað skal ikki verða eftirlatin her ēin steinur uppiá øðrum, sum skal ikki verða kastaður niður.

3 ¶ Og sum hann sat uppiá Olivinfjallinum, komu lærusveinarnir til hansara ēinsærisligani, sigandi, Sig okkum, nær skulu hesi tingini verða? og hvat *skal vera* tekinið um tína komu, og um enda veraldarinnar?

4 Og Jesus svaraði og segði við teir, Verið varnir, at eingin maður villleiði tykkum.

5 Tí at mangir skulu koma í navni mínum, sigandi, Eg eri Christus; og skulu villleiða mangar.

6 Og tit skulu hoyra um kríggj˘ og gramlingar um kríggj˘: síggið til, at tit verði ikki órógvaðir: tí at øll *hesi tingini* mugu bera á, men endin er ikki enn.

7 Tí at tjóð skal rísa ímóti tjóð,

og kongadømi ímóti kongadømi: og verða skulu hungursneyðir, og drepsóttir, og jarðskjálvtar, á ymsum støðum.

8 Øll hesi *eru* byrjanin til *føðingar*sorgir.

9 Tá skulu teir geva tykkum upp til at verða pínslaðar, og skulu drepa tykkum: og tit skulu verða hataðir av øllum tjóðum fyri navns míns skuld.

10 Og tá skulu mangir fáa meinboga, og skulu svíkja hvør annan, og skulu hata hvør annan.

11 Og mangir falskir prophetar skulu rísa, og skulu villleiða mangar.

12 Og av tí at misgerð skal yðja, skal kærleikin hjá mongum vaksa kaldur.

13 Men hann, sum skal halda út *fram*at endanum, hin sami skal verða frelstur.

14 Og hesin gleðiboðskapur kongadømisins skal verða prædikaður í øllum heiminum til ein vitnisburð yvirfyri øllum tjóðum; og so skal endin koma.

15 Tá ið tit tí skulu síggja andstygd oyðingarinnar, talað um av Dániel prophéti, standa í hinum heilaga plássi, (hvør*ið*so lesur, lat hann skilja:)

16 Tá lat tey, sum verði *seg* í Judæu, flýggja í fjøllini:

17 Lat hann, sum er á tekjuni, ikki koma niður at taka nakað ting út úr húsi sínum:

18 Eiheldur lat hann, sum er á markini, venda tilbakar aftur at taka klæðir síni.

19 Og vei teimum sum eru við barn, og til teirra sum geva at súgva í teimum døgum!

20 Men biðjið tit, at tykkara flýggjan verði ikki um veturin, eiheldur á sabbatsdeginum:

21 Tí at tá skal vera mikil trongsla, slík sum var ikki síðan byrjan veraldarinnar til hesa tíð, nei, eiheldur nakrantíð skal verða.

22 Og uttan *at* teir dagarnir skuldu verðið styttir, hevði einkið kjøt verðið frelst: men fyri hinna útvøldu skyld skulu teir dagarnir verða styttir.

23 Tá, um nakar maður skal siga við tykkum, Sí, her *er* Christus, ella har; trúgvið *tí* ikki.

24 Tí at tað skulu rísa falskir Christar, og falskir prophetar, og skulu sýna mikil tekin˘ og undur˘; so mikið, at um *tað var* gjørligt, teir skulu villleiða sjálvastu hinar útvøldu.

25 Sí, eg havi sagt tykkum frammanundan.

26 Hvørsvegna um teir skulu siga við tykkum, Sí, hann er í oyðimørkini; farið ikki fram: sí, *hann er* í loynikømrunum; trúgvið *tí* ikki.

27 Tí at eins og snarljósið kemur út úr eystri, og lýsir enntá at vestri; soleiðis skal eisini koma Menniskjusonarins verða.

28 Tí at hvarsumhelst *ið* ræið er, har vilja ørnirnar verða flykkjaðar saman.

29 ¶ Við tað sama eftir trongslurna av teimum døgum skal sólin verða myrkjað, og mánin skal ikki geva skin sítt, og stjørnurnar skulu falla frá himni, og kreftur himnanna skulu verða skakaðar:

30 Og tá skal birtast tekin Menniskjusonarins í himni: og tá skulu allar ættargreinir jarðarinnar harmast, og tey skulu síggja Menniskjusonin komandi í skýggjum himins við mátti og miklari dýrd.

31 Og hann skal senda einglar sínar við einum miklum ljóði av einum lúðuri, og teir skulu savna saman útvaldu hansara frá teimum fýra vindunum, frá ēinum enda av himni til hīn.

32 Nú, lærið eina dømisøgu av fikutræinum; Tá ið grein tess er enn bleyt, og skjýtur fram bløð, vita tit at summar *er* í náND:

33 So líkaleiðis tit, tá ið tit skulu síggja øll hesi ting, *tá* vitið at tað er nær, *enntá* við dyrnar˘.

34 Sanniliga sigi eg tykkum, Henda ætt skal ikki ganga undir, fyrrenn øll hesi ting verði uppfylt.

35 Himin og jørð skulu ganga undir, men orðini hjá mær skulu ikki ganga undir.

36 ¶ Men um tann dag og tíma veit eingin *maður*, nei, ikki einglar himins, men Faðir mín einans.

37 Men eins og dagar Nó˙ă *vóru,* soleiðis skal eisini koma Menniskjusonarins vera.

38 Tí at eins og í døgunum sum vóru frammanundan flóðini, tey ótu og drukku, giftust og góvu í giftu, inntil tann dag ið Nó˙ĭ fór inn í ørkina,

39 Og vitstu ikki fyrrenn flóðin kom, og tók tey øll burtur; soleiðis skal eisini koma Menniskjusonarins vera.

40 Tá skulu tveir vera á markini; tann ēini skal verða tikin, og hīn *latin* eftir.

41 Tvær *kvinnur skulu* mala á kvørnini; tann ēina skal verða tikin, og hīn *latin* eftir.

42 ¶ Vakið tí: tí at tit vita ikki, hvønn tíma Harri tykkara kemur.

43 Men vitið hetta, at um húsfaðirin av húsinum hevði vitað, í hvørji økt tjóvurin fór at koma, *tá* vildi hann havt vakt, og vildi ikki havt loyvt hús sítt at verðið brotið upp.

44 Verið tit tí eisini tilreiðar: tí at í einum slíkum tíma sum tit ikki halda, kemur Menniskjusonurin.

45 Hvør tá er ein trúgvur og vísur tænari, hvønn harri hansara hevur gjørt *til* stjórnara yvir húsfólki sínum, at geva teimum mat í rættari tíð?

46 Vælsignaður *er* tann tænari, hvønn harri hansara, tá ið hann kemur, skal finna soleiðis gerandi.

47 Sanniliga sigi eg tykkum, At hann skal gera hann *til* stjórnara yvir øllum góðsi sínum.

48 Men og um hin óndi tænari skal siga í hjarta sínum, Mín harri drálar *við* komu síni;

49 Og skal byrja at sláa samtænarar *sínar,* og at eta og drekka við hinum druknu;

50 Harrin hjá tí tænara skal koma í einum degi tá ið hann ikki væntar eftir *honum,* og í einum tíma sum hann er ikki varur við,

51 Og skal skera hann sundur, og tilskila *honum* hansara skamt við hyklarunum: har skal vera grátur og tannagrísl.

KAPITUL 25

TÁ skal kongadømi himins verða líknað við tíggju jomfrýr, sum tóku lampur sínar, og fóru út at møta brúðgóminum.

2 Og fimm teirra vóru vísar, og fimm *vóru* fávitskutar.

3 Tær, sum *vóru* fávitskutar, tóku lampur sínar, og tóku onga olju við sær:

4 Men hinar vísu tóku olju í konnum sínum *saman* við lompum sínum.

5 Meðan brúðgómurin drálaði, durvaðu tær allar og svóvu.

6 Og við midnátt varð eitt róp gjørt, Sí, brúðgómurin kemur; farið tit út at møta honum.

7 Tá risu allar tær jomfrýrnar, og trimmaðu lampur sínar.

8 Og hinar fávitskutu søgdu við hinar vísu, Gevið okkum av olju tykkara; tí at okkara lampur eru slóknaðar.

9 Men hinar vísu svaraðu, og søgdu, *Ei so;* at ikki tað ikki skal verða nóg mikið hjá okkum og tykkum: men farið tit heldur til teirra sum selja, og keypið til tykkara sjálvs.

10 Og meðan tær fóru at keypa, kom brúðgómurin; og tær, sum vóru búnar, fóru inn við honum

til brúdleypið: og hurðin varð latin aftur.

11 Síðan komu eisini hīnar jomfrúgvarnar, sigandi, Harri, Harri, lat upp fyri okkum.

12 Men hann svaraði og segði, Sanniliga sigi eg tykkum, Eg kenni tykkum ikki.

13 Vakið tí, tí at tit vita hvørki dagin ella tíman, í hvørjum Menniskjusonurin kemur.

14 ¶ Tí at *kongadømi himins er* eins og ein maður, ferðandi inn í eitt fjarlagið land, *sum* kallaði sínar egnu tænarar, og fekk teimum góðs sítt.

15 Og ēinum gav hann fimm talentir, øðrum tvær, og øðrum ēina; til hvønn mann samsvarandi við førimun hansara fyri seg; og beinanvegin tók ferð sína.

16 Tá fór hann, sum hevði tikið við teimum fimm talentunum, og handlaði við hinum somu, og gjørdi *tær til* aðrar fimm talentir.

17 Og somuleiðis hann, sum *hevði tikið við* tveimum, eisini hann vann aðrar tvær.

18 Men hann, sum tikið hevði við ēinari, fór og gróv í jørðina, og fjaldi pening harra síns.

19 Eftir langa tíð kemur harrin hjá teimum tænarunum, og roknar *upp* við teir.

20 Og so hann, sum tikið hevði við fimm talentum, kom, og kom við øðrum fimm talentum, sigandi, Harri, tú fekst mær fimm talentir: sí, eg havi vunnið umframt tær fimm talentir afturat.

21 Harri hansara segði við hann, Væl gjørt, *tú* góði og trúgvi tænari: tú hevurt verið trúgvur yvir fáum tingum, eg vil gera teg *til* stjórnara yvir mongum tingum: gakk tú inn til frøi harra tíns.

22 Hann eisini, sum hevði tikið við tveimum talentum, kom og segði, Harri, tú fekst mær tvær talentir: sí, eg havi vunnið tvær aðrar talentir umframt tær.

23 Harri hansara segði við hann, Væl gjørt, góði og trúgvi tænari; tú hevurt verið trúgvur yvir fáum tingum, eg vil gera teg *til* stjórnara yvir mongum tingum: gakk tú inn til frøi harra tíns.

24 So kom hann, sum hevði tikið við hini ēinu talentini, og segði, Harri, eg kendi teg, at tú ert ein harður maður, heystandi inn har tú hevurt ikki sáað, og savnandi har tú ei hevurt stroytt:

25 Og eg var ræddur, og fór og fjaldi talentina hjá tær í jørðini: sí, *har* hevurt tú *tað ið* títt *er*.

26 Harri hansara svaraði og segði við hann, *Tín* vondi og lati tænari, tú vitstirt, at eg heysti inn har eg sáaði ikki, og savni saman har eg ei havi stroytt:

27 Tú áttirt tí at havt latið pening mín til vekslaranna, og *tá* við mína komu skuldi eg havt fingið mítt egna við rentu.

28 Takið tí talentina frá honum, og gevið honum *hana,* sum hevur tíggju talentir.

29 Tí at hvørjum tí, sum hevur, skal verða givið, og hann skal hava ríkiligsemi: men frá honum, sum hevur ikki, skal verða tikið burtur sjálvt tað sum hann hevur.

30 Og kastið tit hin ónýta tænaran inn í ytra myrkur: har skal vera grátur og tannagrísl.

31 ¶ Tá ið Menniskjusonurin skal koma í dýrd síni, og allir hinir heilagu einglarnir við honum, tá skal hann sita uppiá hásætinum av síni dýrd:

32 Og frammi fyri honum skulu vera savnaðar allar tjóðir: og hann skal skilja tær ēina frá aðrari, eins og ein hirði atskilir seyðir *sínar* frá geitunum:

33 Og hann skal seta seyðin við sína høgru hond, men geitirnar við hina vinstru.

34 Tá skal Kongurin siga við teir við sína høgru hond, Komið,

tit vælsignaðu hjá Faðir mínum, arvið kongadømið, fyribúgvið til tykkara frá grundlegging veraldarinnar:

35 Tí at eg var ein hungraður, og tit góvu mær mat: eg var tyrstur, og tit góvu mær drekka: eg var ein fremmandur, og tit tóku meg inn:

36 Nakin, og tit klæddu meg: eg var sjúkur, og tit vitjaðu meg: eg var í fongsli, og tit komu til mín.

37 Tá skulu teir rættvísu svara honum, sigandi, Harri, nær sóu vit teg ein hungraðan, og mataðu *teg?* ella tyrstan, og góvu *tær* drekka?

38 Nær sóu vit teg ein fremmandan, og tóku *teg* inn? ella naknan, og klæddu *teg?*

39 Ella nær sóu vit teg sjúkan, ella í fongsli, og komu til tín?

40 Og Kongurin skal svara og siga við teir, Sanniliga sigi eg tykkum, So framt sum tit hava gjørt *tað* at ēinum av teimum minstu av hesum brøðrum mínum, hava tit gjørt *tað* at mær.

41 Tá skal hann siga eisini við teir við hina vinstru hond, Farið burtur frá mær, bannaðu tit, inn í ævigtvarandi eld, fyribúgvin til djevulin og einglar hansara:

42 Tí at eg var ein hungraður, og tit góvu mær ongan mat: eg var tyrstur, og tit góvu mær einkið drekka:

43 Eg var ein fremmandur, og tit tóku meg ikki inn: nakin, og tit klæddu meg ikki: sjúkur, og í fongsli, og tit vitjaðu meg ikki.

44 Tá skulu teir eisini svara honum, sigandi, Harri, nær sóu vit teg ein hungraðan, ella tyrstan, ella ein fremmandan, ella naknan, ella sjúkan, ella í fongsli, og tæntu tær ikki?

45 Tá skal hann svara teimum, sigandi, Sanniliga sigi eg tykkum, So framt sum tit gjørdu *tað* ikki mót ēinum av teimum minstu av hesum, gjørdu tit *tað* ikki móti mær.

46 Og hesir skulu fara burt inn í ævigtvarandi revsing: men hinir rættvísu inn í ævigt lív.

KAPITUL 26

OG tað bar á, tá ið Jesus hevði endað allar hesar framsagnir, segði hann við lærusveinar sínar,

2 Tit vita, at eftir tveir dagar er umleyps-*hátíðin,* og Menniskjusonurin verður svikin til *tess* at verða krossfestur.

3 Tá savnaðust saman teir fremstu prestarnir, og hinir skriftlærdu, og hinir elstu av fólkinum, at borgini hjá høvuðsprestinum, sum kallaðist Caĭ-â-phăs,

4 Og løgdu ráð, at teir máttu taka Jesus við sniðfundni, og drepa *hann.*

5 Men teir søgdu, Ikki á hátíðar-*deginum,* at ikki tað verði eitt uppstig millum fólkið.

6 ¶ Nú, tá ið Jesus var í Bethaniu, í húsinum hjá Símuni tí spitalska,

7 Kom til hansara ein kvinna, havandi eina alabastur-krukku við sera dýrabærari salvu, og helti hana á høvur hansara, sum hann sat *til matar.*

8 Men tá ið hansara lærusveinar sóu *tað,* høvdu teir harmavreiði, sigandi, Til hvat endamál *er* henda burturspilling?

9 Tí at henda salva mátti havt verðið seld fyri mikið, og givið til hini fátøku.

10 Tá ið Jesus skilti *tað,* segði hann við teir, Hví órógva tit kvinnuna? tí at hon hevur virkað eitt gott verk uppá meg.

11 Tí at tit hava hini fátøku altíð hjá tykkum; men meg hava tit ikki altíð.

12 Tí at við tað at hon hevur

helt hesa salvu á likam mítt, gjørdi hon *tað* til jarðan mína.

13 Sanniliga sigi eg tykkum, Hvarsumhelst *ið* hesin gleðiboðskapurin skal verða prædikaður í øllum heiminum, *har* skal eisini hetta, sum henda kvinna hevur gjørt, verða sagt frá til eitt minni um hana.

14 ¶ Tá fór ēin av teimum tólv, kallaður Judas Iscariot, at teimum fremstu prestunum,

15 Og segði *við teir,* Hvat vilja tit geva mær, og eg vil geva hann upp til tykkara? Og teir sáttmáluðu við hann fyri tríati stykkir av silvuri.

16 Og frá teirri tíð søkti hann høvi til at svíkja hann.

17 ¶ Nú, hin fyrsta *dagin* av *hátíðini av* ósúrgaðum breyði komu lærusveinarnir til Jesu, sigandi við hann, Hvar vilt tú, at vit tilreiða til tín at eta umleypið?

18 Og hann segði, Farið inn í staðin til tann *og tann* mannin, og sigið við hann, Meistarin sigur, Mín tíð er fyri hond; eg vil halda umleypið í húsi tínum við lærusveinum mínum.

19 Og lærusveinarnir gjørdu eins og Jesus hevði fyriskipað teimum; og teir gjørdu umleypið tilreiðar.

20 Nú, tá ið kvøldið var komið, settist hann niður við teimum tólv.

21 Og sum teir ótu, segði hann, Sanniliga sigi eg tykkum, at ēin av tykkum skal svíkja meg.

22 Og teir vórðu avbera syrgnir, og tóku hvør *og* ēin av teimum at siga við hann, Harri, er tað eg?

23 Og hann svaraði og segði, Hann, sum dyppar hond *sína* við mær í fatið, hin sami skal svíkja meg.

24 Menniskjusonurin fer, eins og skrivað stendur um hann: men vei tí manni, viðˆ hvørjum Menniskjusonurin verður svikin! tað hevði verið gott hjá tí manni, um hann hevði ikki verðið føddur.

25 Tá svaraði Judas, sum sveik hann, og segði, Meistari, er tað eg? Hann segði við hann, Tú hevurt sagt.

26 ¶ Og sum teir ótu, tók Jesus breyð, og vælsignaði *tað,* og breyt *tað,* og gav *tað* til lærusveinanna, og segði, Takið, etið; hetta er likam mítt.

27 Og hann tók bikarið, og veitti tøkkir, og gav *tað* til teirra, sigandi, Drekkið tit allir av tí;

28 Tí at hetta er blóð mítt hins nýggja testamentis, sum verður úthelt fyri mangar til eftirgeving syndanna.

29 Men eg sigi tykkum, Eg vil ikki drekka hiðanífrá av hesum ávøksti víntræsins, inntil tann dag, tá ið eg drekki hann nýggjan við tykkum í kongadømi Faðirs míns.

30 Og tá ið teir høvdu sungið ein lov-psálm, fóru teir út á Olivinfjallið.

31 Tá sigur Jesus við teir, Allir tit skulu fáa meinboga vegna mín hesa nátt: tí at skrivað stendur, Eg vil sláa hirðan, og seyðurin av fylginum skal verða spjaddur útumkring.

32 Men eftir *at* eg eri risin *upp* aftur, vil eg fara undan tykkum inn í Galilēu.

33 Pætur svaraði og segði við hann, Tó *at* allir *menn* skulu fáa meinboga tín vegna, *tó* vil eg aldri fáa meinboga.

34 Jesus segði við hann, Sanniliga sigi eg tær, At hesa nátt, áðrenn hanin gelur, skalt tú avnokta meg trærreisur.

35 Pætur segði við hann, Tó *at* eg skuldi doyð við tær, tó vil eg ikki avnokta teg. Somuleiðis eisini søgdu allir lærusveinarnir.

36 ¶ Tá kemur Jesus við teimum at einum plássi, kallaðum Gēthsē´-mâ-nē, og sigur við lærusveinar-

nar, Setist tit her, meðan eg fari og biði haryviri.

37 Og hann tók við sær Pætur og teir báðar synir Zĕb-ĕ-dēē´-ŭs-ar, og tók at verða sorgarfullur og sera tungur.

38 Tá sigur hann við teir, Sál mín er avbera sorgarfull, alt at deyða: verðið tit her, og vakið við mær.

39 Og hann fór eitt sindur longur, og fell á andlit sítt, og bað, sigandi, O Faðir mín, um tað veri gjørligt, lat hetta bikar fara um meg: hóast hetta, ikki sum eg vil, men sum tú *vilt*.

40 Og hann kemur til lærusveinanna, og finnur teir sovandi, og sigur við Pætur, Hvat, kundu tit ikki vaka við mær ēin tíma?

41 Vakið og biðjið, at tit innfari ikki inn í freisting: andin víst *er* viljugur, men kjøtið *er* veikt.

42 Hann fór burtur aftur aðru ferðina, og bað, sigandi, O Faðir mín, um hetta bikar mái ikki fara burtur frá mær, uttan eg drekki tað, verði gjørdur vilji tín.

43 Og hann kom og fann teir aftur sovandi: tí at eygu teirra vóru tung.

44 Og hann fór frá teimum, og fór avstað aftur, og bað triðju ferðina, sigandi hini somu orðini.

45 Tá kemur hann til lærusveina sína, og sigur við teir, Sovið nú víðari, og heintið hvíld *tykkara:* sí, tímin er í nánd, og Menniskjusonurin verður svikin inn í hendurnar á syndarum.

46 Rísið, latum okkum fara: sí, hann er fyri hond, sum svíkur meg.

47 ¶ Og meðan hann enn talaði, sí, Judas, ēin av teimum tólv, kom, og við honum ein mikil fjøld við svørðum og stavum, frá teimum fremstu prestunum og elstu av fólkinum.

48 Nú, hann sum sveik hann, gav teimum eitt tekin, sigandi, Hvønnsumhelst *ið* eg skal kyssa, hin sami er hann: haldið honum fast.

49 Og við tað sama kom hann til Jesu, og segði, Heilur *og sælur,* meistari; og kysti hann.

50 Og Jesus segði við hann, Vinur, hvørsvegna ert tú komin? Tá komu teir, og løgdu hendur á Jesus, og tóku hann.

51 Og sí, ēin av teimum sum vóru við Jesusi, rætti út hond *sína,* og dró svørð sítt, og sló ein tænara hjá høvuðsprestinum, og hjó av oyra hansara.

52 Jesus tá segði við hann, Set upp aftur svørð títt í pláss sítt: tí at allir teir, sum taka *til* svørðið, skulu týnast við svørðinum.

53 Hugsart tú, at eg kann ikki nú biðja til Faðirs míns, og hann skal í stundini geva mær meira enn tólv legiónir av einglum?

54 Men hvussu skulu tá skriftirnar verða uppfyltar, at svá má tað verða?

55 Í hini somu stund segði Jesus við mannfjøldirnar, Eru tit komnir út sum ímóti einum ránsmanni við svørðum og stavum fyri at taka meg? Eg sat dagligani hjá tykkum og frálærdi í templinum, og tit løgdu einkið hald á meg.

56 Men alt hetta varð gjørt, at skriftir prophetanna máttu verða uppfyltar. Tá yvirgóvu allir lærusveinarnir hann, og flýddu.

57 ¶ Og teir, sum høvdu lagt hald á Jesus, leiddu *hann* avstað til høvuðsprestin Caï´-â-phăs, har hinir skriftlærdu og teir elstu vóru savnaðir.

58 Men Pætur fylgdi honum langt burturifrá at borgini hjá høvuðsprestinum, og fór inn, og settist hjá tænarunum, at síggja endan.

59 Nú, teir fremstu prestarnir, og elstu, og alt ráðið, søktu rangan vitnisburð ímóti Jesusi, *fyri* at taka hann av lívi;

60 Men funnu einkið: ja, hóast mong følsk vitnir komu, *tó* funnu teir einkið. Til síðst komu tvey følsk vitnir,

61 Og søgdu, Hesin *felagin* segði, Eg eri mentur at oyðileggja tempul Guðs, og at byggja tað á trimum døgum.

62 Og høvuðspresturin reistist, og segði við hann, Svarart tú einkið? hvat *er tað, sum* hesi vitna ímóti tær?

63 Men Jesus helt friði sínum. Og høvuðspresturin tók til orða og segði við hann, Eg svørji teg við hin livandi Guð, at tú sigi okkum, hvørt tú veri Christus, Sonur Guðs.

64 Jesus sigur við hann, Tú hevurt sagt: hóast hetta, eg sigi tykkum, Hereftir skulu tit síggja Menniskjusonin sitandi við høgru hond kraftar, og komandi í skýggjum himins.

65 Tá skræddi høvuðspresturin klæðir síni, sigandi, Hann hevur talað Guðsspottan; hvønn víðari tørv hava vit á vitnum? sí, nú hava tit hoyrt hansara Guðsspottan.

66 Hvat halda tit? Teir svaraðu og søgdu, Hann er sekur til deyða.

67 Tá spýttu teir í andlit hansara, og bardu hann; og aðrir slógu *hann* við lógvum sínum,

68 Sigandi, Prophetera at okkum, tú Christus, Hvør er hann ið sló teg?

69 ¶ Nú, Pætur sat uttanfyri í borgar*garð*inum: og ein genta kom til hansara, sigandi, Eisini tú vart við Jesusi úr Galilēu.

70 Men hann noktaði frammi fyri *teim* øllum, sigandi, Eg veit ikki hvat tú sigurt.

71 Og tá ið hann var farin út í inngongdina, sá ein onnur *terna* hann, og segði við tey sum vóru har, Hesin *felagin* var eisini við Jesusi úr Nazareth.

72 Og aftur noktaði hann við einum eiði, Eg kenni ikki mannin.

73 Og eftir eina løtu komu at *honum* teir sum stóðu hjá, og søgdu við Pætur, Vissuliga ert tú eisini *ēin* av teimum; tí at tala tín avdúkar teg.

74 Tá tók hann at banna og at svørja, *sigandi,* Eg kenni ikki mannin. Og í stundini gól hanin.

75 Og Pætur mintist orðið hjá Jesusi, sum segði við hann, Áðrenn hanin gelur, skalt tú avnokta meg trærreisur. Og hann fór út, og græt beiskliga.

KAPITUL 27

TÁ ið morgunin var komin, hildu allir teir fremstu prestarnir og elstu av fólkinum ráð saman ímóti Jesusi at taka hann av lívi:

2 Og tá ið teir høvdu bundið hann, leiddu teir *hann* avstað, og góvu hann yvir til Pontiusar Pilatusar, landsstjórans.

3 ¶ Judas, sum hevði svikið hann, tá ið hann sá at hann var fordømdur, tá iðraði seg, og kom aftur við teim tríati stykkjunum av silvuri til teir fremstu prestarnar og elstu,

4 Sigandi, Eg havi syndað, í at eg havi svikið hitt sakleysa blóð. Og teir søgdu, Hvat *er* okkum um *tað?* síggj tú *um tað*.

5 Og hann kastaði niður stykkini av silvuri í templinum, og fór avstað, og fór og hongdi seg.

6 Og fremstu prestarnir tóku stykkini av silvuri, og søgdu, Tað er ikki lógligt til tess at lata tey inn í skattkamarið, av tí at tað er blóðs-prísurin.

7 Og teir løgdu saman ráð, og keyptu pottamakara-akurin fyri tey, at jarða útlendingar í.

8 Hvørsvegna tann akurin varð kallaður, Blóðs-akurin, at hesum degi.

9 Tá varð uppfylt tað, sum varð

talað viðˆ Jeremiasi propheti, sigandi, Og teir tóku tey tríati stykkini av silvuri, prísin á honum sum varð mettur, hvønn teir av Ísraels børnum mettu;

10 Og góvu tey fyri pottamakara-akurin, *soleiðis* sum Harrin fyriskipaði mær.

11 Og Jesus stóð frammi fyri landsstjóranum: og landsstjórin spurdi hann, sigandi, Ert tú Kongur Jødanna? Og Jesus segði við hann, Tú sigurt.

12 Og tá ið hann varð ákærdur av teimum fremstu prestunum og elstu, svaraði hann einkið.

13 Tá segði Pilatus við hann, Hoyrirt tú ikki, hvussu mong ting teir vitna ímóti tær?

14 Og hann svaraði honum uppá aldri eitt orð; so mikið, at landsstjórin undraðist mikilliga.

15 Nú, á *teirri* hátíðini var landsstjórin vanur at lata fólkinum ein fanga leysan, hvønn teir vildu.

16 Og teir høvdu tá ein viðgitnan fanga, kallaðan Bâr´-ăb-băs.

17 Tessvegna, tá ið teir vóru savnaðir saman, segði Pilatus við teir, Hvønn vilja tit, at eg lati tykkum leysan? Bâr´-ăb-băs, ella Jesus, sum er kallaður Christus?

18 Tí hann vitsti, at *tað var* fyri øvund, teir høvdu givið hann upp.

19 ¶ Tá ið hann var setstur niður á dómarasætið, sendi kona hansara til hansara, sigandi, Hav tú einkið at gera við handa rættvísa mann: tí at eg havi útstaðið mangar lutir henda dag í einum dreymi uppá grund av honum.

20 Men teir fremstu prestarnir og elstu yvirtalaðu mannfjøldina, at tey skuldu umbiðja Bâr´-ăb-băs, og oyða Jesus.

21 Landsstjórin tók til orða og segði við tey, Hvønn av teimum báðum vilja tit, at eg lati tykkum leysan? Tey søgdu, Bâr´-ăb-băs.

22 Pilatus sigur við tey, Hvat skal eg tá gera við Jesus, sum er kallaður Christus? *Tey* siga øll við hann, Lat hann verða krossfestan.

23 Og landsstjórin segði, Hví, hvat ilt hevur hann gjørt? Men tey rópaðu út tess meira, sigandi, Lat hann verða krossfestan.

24 ¶ Tá ið Pilatus sá, at hann kundi einkið gagna, men *at* heldur ein ófriður var komin í, tók hann vatn, og tvó *sínar* hendur frammi fyri mannamúgvuni, sigandi, Eg eri sakleysur í blóðinum av hesum rættvísa persóni: síggið tit *til tess*.

25 Tá svaraði alt fólkið, og segði, Blóð hansara *veri* á okkum, og á børnum okkara.

26 ¶ Tá læt hann teimum Bâr´-ăb-băs leysan: og tá ið hann hevði húðflett Jesus, gav hann *hann* yvir til at verða krossfestan.

27 Tá tóku hermenninir hjá landsstjóranum Jesus inn í ta almennu høllina, og savnaðu at honum alt liðið *av hermonnum*.

28 Og teir berkaðu hann, og lótu hann í eina skarlaks skikkju.

29 ¶ Og tá ið teir høvdu flættað eina krúnu av tornum, settu teir *hana* uppá høvur hansara, og ein sevlegg í høgru hond hansara: og teir boygdu knæið fyri honum, og háðaðu hann, sigandi, Heilur *og sælur,* Jøda Kongur!

30 Og teir spýttu uppá hann, og tóku sevleggin, og slógu hann á høvdið.

31 Og eftir at teir høvdu háðað hann, tóku teir skikkjuna uttan av honum, og lótu hann í hans egna klædnað, og leiddu hann avstað til at krossfesta *hann*.

32 Og sum teir komu út, funnu teir ein mann úr Cý-rē´-nĕ, Símun at navni: hann noyddu teir at bera kross hansara.

33 Og tá ið teir vóru komnir at einum staði, kallaðum Göl´-gă-thă, tað vil siga, eitt skallastað,

34 ¶ Góvu teir honum edik at drekka, blandað við galli: og tá ið hann hevði smakkað *av tí,* vildi hann ikki drekka.

35 Og teir krossfestu hann, og skiftu klæðir hansara sundur, kastandi lutir: at tað mátti verða uppfylt, sum varð talað við prophetinum, Teir skiftu míni klæðir sundur sín ámillum, og um mín kappa teir kastaðu lutir.

36 Og, sitandi niðri, eygleiddu teir hann har;

37 Og settu uppiyvir høvdi hansara ákæru hansara skrivað, HESIN ER JESUS KONGUR JØDANNA.

38 Tá vórðu tað tveir ránsmenn krossfestir *saman* við honum, ein til høgru handar, og ein annar til vinstru.

39 ¶ Og teir sum komu framvið, skeldaðu hann út, vaggandi høvdum sínum,

40 Og sigandi, Tú sum oyðirt templið, og byggirt *tað* á trimum døgum, frels teg sjálvan. Um tú veri Sonur Guðs, kom niður frá krossinum.

41 Somuleiðis eisini teir fremstu prestarnir, spottandi *hann,* við teimum skriftlærdu og elstu, søgdu,

42 Hann frelsti onnur; seg sjálvan kann hann ikki frelsa. Um hann veri Kongur Ísraels, lat hann nú koma niður frá krossinum, og vit vilja trúgva honum.

43 Hann leit á Guð; lat hann nú bjarga honum, um hann vilji hava hann: tí at hann segði, Eg eri Sonur Guðs.

44 Tjóvarnir eisini, sum vórðu krossfestir við honum, settu hitt sama at honum.

45 Nú, frá tí sætta tímanum var myrkur yvir øllum landinum, at tí níggjunda tímanum.

46 Og um hin níggjunda tíman ropti Jesus við harðari rødd, sigandi, Ē′-lī, Ē′-lī, lā′-mă sâ-băch-thā′-nī? tað vil siga, Guð mín, Guð mín, hví hevurt tú yvirgivið meg?

47 Summir av teimum sum stóðu har, tá ið teir hoyrdu *tað,* søgdu, Hesin *maður* kallar eftir Ē-lī′-ăs-i.

48 Og beinanvegin rann ēin av teimum, og tók ein svamp, og fylti *hann* við ediki, og setti *hann* á ein rørstav, og gav honum at drekka.

49 Restin segði, Lat vera, latum okkum sjá, hvørt Ē-lī′-ăs vil koma at bjarga honum.

50 ¶ Jesus, tá ið hann hevði ropt aftur við harðari rødd, gav upp andan.

51 Og sí, forhangið av templinum varð skrætt í tvent frá ovast til niðast; og jørðin skalv, og klettarnir klovnaðu;

52 Og gravirnar vórðu opnaðar; og mong likam av teimum heilagu, sum svóvu, risu *upp,*

53 Og komu út úr grøvunum eftir uppreisn hansara, og fóru inn í hin heilaga stað, og birtust mongum.

54 Nú, tá ið herovastin, og teir sum vóru við honum, vaktandi Jesus, sóu jarðskjálvtan, og teir lutir sum vórðu gjørdir, óttaðust teir stórliga, sigandi, Sanniliga, hesin var Sonur Guðs.

55 Og mangar kvinnur vóru har, hyggjandi *at* langt burturifrá, hvørjar fylgdu Jesusi úr Galilēu, tænandi honum:

56 Hvørja millum vóru Maria Măg-dă-lē′-nă; og Maria, móðir Jákobs og Jó′-sĕs-ar; og móðirin at Zĕb-ĕ-dēē′-ūs-ar børnum.

57 Tá ið kvøldið var komið, kom ein ríkur maður úr Âr-ĭ-mă-thǣ′-ŭ, nevndur Joseph, sum eisini sjálvur var lærusveinur Jesu:

58 Hann fór til Pilatusar, og biddaði likamið av Jesusi. Tá skipaði Pilatus likamið at verða latið.

59 Og tá ið Jóseph hevði tikið likamið, sveipaði hann tað í eitt reint línklæði,

60 Og legði tað í sína egnu nýggju grøv, sum hann hevði høgt út inn í klettin: og hann rullaði ein stóran stein til dyrnar á gravhýsinum, og fór avstað.

61 Og har vóru Maria Măg-dă-lē´-nă, og hīn Maria, sitandi yvir av gravhýsinum.

62 ¶ Nú, tann næsta dagin, sum fylgdi tilreiðingardeginum, komu teir fremstu prestarnir og Pharisēararnir saman til Pilatusar,

63 Sigandi, Tygum, vit minnast, at hasin villleiðarin segði, meðan hann var enn á lívi, Eftir tríggjar dagar vil eg rísa aftur.

64 Skipa tí, at gravhýsið verði gjørt trygt inntil hin triðja dagin, at ikki hansara lærusveinar komi um nátt*ina,* og stjali hann burtur, og sigi við fólkið, Hann er risin frá teimum deyðu: so skal tann seinna villfaringin verða verri enn hin fyrra.

65 Pilatus segði við teir, Tit hava eina vakt: farið veg tykkara, gerið *tað* so trygt sum tit kunnu.

66 So teir fóru, og gjørdu gravhýsið trygt, innsiglandi steinin, og setandi eina vakt.

KAPITUL 28

VIÐ endan á sabbatinum, sum tað tók at lýsna ímóti hinum fyrsta *degi* vikunnar, komu Maria Măg-dă-lē´-nă og hīn Maria at síggja gravhýsið.

2 Og sí, tað varð ein mikil jarðskjálvti: tí at eingil Harrans steig niður frá himni, og kom og rullaði tilbakar steinin frá dyrnum, og settist uppá hann.

3 Ásjón hansara var lík snarljósi, og hansara klædnaður hvítur sum snjó:

4 Og av ótta fyri honum skulvu vaktarmenninir, og vórðu eins og deyðir *menn*.

5 Og eingilin tók til orða og segði við kvinnurnar, Óttist ikki tit: tí at eg veit, at tit søkja Jesus, sum var krossfestur.

6 Hann er ikki her: tí at hann er *upp*risin, sum hann segði. Komið, síggið staðið har Harrin lá.

7 Og farið skundisligani, og sigið hansara lærusveinum, at hann er risin frá teimum deyðu; og sí, hann fer undan tykkum inn í Galilēu; har skulu tit síggja hann: sí, eg havi sagt tykkum.

8 Og tær fóru avstað skundisligani frá gravhýsinum við ótta og miklari frøi; og runnu at bera hansara lærusveinum orð.

9 ¶ Og sum tær fóru at siga lærusveinum hansara, sí, Jesus møtti teimum, sigandi, Heilar *og sælar* allar. Og tær komu og hildu honum við føturnar, og tilbóðu hann.

10 Tá segði Jesus við tær, Verið ikki ræddar: farið og sigið brøðrum mínum, at teir fari inn í Galilēu, og har skulu teir síggja meg.

11 ¶ Nú, sum tær fóru, sí, summir av vaktarmonnunum komu inn í staðin, og sýndu teimum fremstu prestunum øll tey tingini sum vóru gjørd.

12 Og tá ið teir vóru savnaðir við hinum elstu, og høvdu hildið ráðagerð, góvu teir hermonnunum væl av peningi,

13 Sigandi, Sigið tit, Hansara lærusveinar komu um nátt*ina,* og stjólu hann *burtur* meðan vit svóvu.

14 Og um hetta komi landsstjóranum fyri oyru, vilja vit yvirtala hann, og tryggja tykkum.

15 So teir tóku peningin, og gjørdu sum teir vórðu lærdir: og henda framsøgn er vanliga fráboðað millum Jødanna inntil henda dag.

16 ¶ Tá fóru teir ellivu lærusveinarnir avstað inn í Galilēu, á

eitt fjall, har Jesus hevði fyriskipað teimum.
17 Og tá teir sóu hann, tilbóðu teir hann: men summir ivaðust.
18 Og Jesus kom og talaði til teirra, sigandi, Allur máttur er givin mær í himni og á jørð.
19 ¶ Farið tit tessvegna, og lærið allar tjóðir, doypandi tey í navni Faðirsins, og Sonarins, og Halga Andans:
20 Lærandi tey at geva øllum lutum ans, hvørjumsumhelst *ið* eg havi boðið tykkum: og sí, eg eri við tykkum allan veg, *alt* at enda veraldarinnar. Á-měn.

EVANGELIIÐ SAMBÆRT ST. MARKUSI.

KAPITUL 1

BYRJANIN av gleðiboðskapi Jesu Christs, Sonar Guðs;
2 Eins og skrivað stendur í prophetunum, Sí, eg sendi mítt sendiboð undan andliti tínum, sum skal fyribúgva veg tín undan tær.
3 Røddin á einum, rópandi í oyðimørkini, Fyribúgvið tit veg Harrans, gerið gøtur hansara beinar.
4 Jóhannes doypti í oyðuni, og prædikaði umvendingardópin til eftirgeving syndanna.
5 Og tað fóru út til hansara alt land Judæu, og tey úr Jerusalem, og vórðu øll doypt av honum í Jordans-ánni, játtandi syndir sínar.
6 Og Jóhannes var klæddur við kamelhári, og við einum gyrðli av einum skinni um lendar sínar; og hann át grashoppur og villan hunang;
7 Og prædikaði, sigandi, Tað kemur ein, mektigari enn eg, eftir meg, tvongina á hvørs skóm eg eri ikki verdigur at boyggja *meg* niður og loysa upp.
8 Eg víst havi doypt tykkum við vatni: men hann skal doypa tykkum við Halga Andanum.
9 Og tað bar á í teimum døgum, at Jesus kom frá Nazareth av Galilēu, og varð doyptur av Jóhannesi í Jordan.
10 Og beinanvegin, komandi upp út úr vatninum, sá hann himnarnar opnaðar, og Andan líkasum ein dúgva, stígandi niður uppá hann:
11 Og tað kom ein rødd frá himni, *sigandi,* Tú ert mín háttelskaði Sonur, í hvørjum eg eri væl toknaður.
12 Og við tað sama drívur Andin hann inn í oyðuna.
13 Og hann var har í oyðuni *í* fjøruti dagar, freistaður av Satan; og var hjá villdjórunum; og einglarnir tæntu at honum.
14 Nú, eftir at Jóhannes var settur í fongsul, kom Jesus inn í Galilēu, prædikandi gleðiboðskap kongadømis Guðs,
15 Og sigandi, Tíðin er uppfylt, og kongadømi Guðs er fyri hond: vendið tit um, og trúgvið gleðiboðskapinum.
16 Nú, sum hann gekk við Galilēu-sjógvin, sá hann Símun og Andreas, bróður hansara, kastandi eitt garn inn í sjógvin: tí at teir vóru fiskarar.
17 Og Jesus segði við teir, Komið tit aftaná mær, og eg vil fáa tykkum at gerast mannafiskarar.
18 Og beinanvegin yvirgóvu teir gørnini, og fylgdu honum.
19 Og tá ið hann hevði gingið eitt sindur longur haðani, sá hann Jákob — *son* Zĕb-ĕ-dēē´-ŭs-ar, og Jóhannes — bróður hansara, sum

eisini vóru í bátinum, bøtandi gørn síni.

20 Og beinanvegin kallaði hann teir: og teir eftirlótu Zĕb-ĕ-dēē´-ŭs, faðir sín, í bátinum, við teimum leigaðu tænarunum, og fóru aftaná honum.

21 Og teir fóru inn í Că-pĕr´-nă-ŭm; og beinanvegin á sabbatsdeginum fór hann inn í sýnagoguna, og frálærdi.

22 Og teir vórðu ovfarnir yvir hansara Guðslæru: tí hann lærdi teir sum ēin ið hevði myndugleika, og ikki sum hinir skriftlærdu.

23 Og har var í sýnagogu teirra ein maður við einum óreinum anda; og hann rópaði út,

24 Sigandi, Lat *okkum* vera; hvat hava vit at gera við teg, tú Jesus úr Nazareth? ert tú komin at oyða okkum? eg kenni teg hvør tú ert, Hin Heilagi Guðs.

25 Og Jesus hartaði hann, sigandi, Halt friði tínum, og kom út úr honum.

26 Og tá hin óreini andin hevði skrætt *í* hann, og rópað við harðari rødd, kom hann út úr honum.

27 Og tey vórðu øll ovfarin, so mikið at tey spurdust ámillum sín, sigandi, Hvat ting er hetta? hvør nýggj Guðslæra *er* hendan? tí at við myndugleika býður hann enntá teimum óreinu andunum, og teir lýða hann.

28 Og alt fyri eitt spreiddist hansara giti útumkring út gjøgnum alt umráðið runt um Galilēu.

29 Og við tað sama, tá ið teir vóru komnir út úr sýnagoguni, fóru teir inn í húsið hjá Símuni og Andreasi, við Jákobi og Jóhannesi.

30 Men móðir konu Símunar lá sjúk av hitasótt, og straks siga teir honum frá um hana.

31 Og hann kom og tók í hondina á henni, og lyfti hana upp; og alt fyri eitt fór hitasóttin frá henni, og hon tænti teimum.

32 Og um aftan, tá ið sólin setti, førdu tey til hansara øll sum vóru sjúkufongd, og tey sum vóru heltikin við djevlum.

33 Og allur staðurin var savnaður saman við dyrnar.

34 Og hann grøddi mong sum vóru sjúk av ymsum sjúkdómum, og kastaði út mangar djevlar; og loyvdi ikki djevlunum at tala, av tí at teir kendu hann.

35 Og um morgunin, rísandi upp eina góða stund fyri dag, fór hann út, og fór burtur á eitt oyðistað, og har bað.

36 Og Símun, og teir sum vóru við honum, fylgdu aftaná honum.

37 Og tá ið teir høvdu funnið hann, søgdu teir við hann, Allir *menn* søkja eftir tær.

38 Og hann segði við teir, Latum okkum fara inn í teir næstu býirnar, at eg má prædika har eisini: tí at tessvegna kom eg fram.

39 Og hann prædikaði í sýnagogum teirra út um alt Galilēa, og kastaði út djevlar.

40 Og har kom ein spitalskur til hansara, bønandi hann, og knelandi niður fyri honum, og sigandi við hann, Um tú vilt, tú kanst gera meg reinan.

41 Og Jesus, rørdur við várkunn, rætti fram *sína* hond, og nam við hann, og sigur við hann, Eg vil; veri tú reinur.

42 Og so skjótt sum hann hevði talað, við tað sama fór spitalskusjúkan frá honum, og hann varð reinsaður.

43 Og strangliga álegði hann honum, og við tað sama sendi hann avstað;

44 Og sigur við hann, Síggj *til, at* tú sigi einkið við nakran mann: men far tín veg, sýn teg fyri prestinum, og ofra fyri tína reinsan tey tingini sum Móses skipaði, til ein vitnisburð yvirfyri teimum.

45 Men hann fór út, og tók at kunngera *tað* mikið, og at spreiða sakina útumkring, so mikið, at

Jesus kundi ikki meira opinlýsliga fara inn í staðin, men var fyri uttan á oyðistøðum: og tey komu til hansara frá hvørjum *heraðs*horni.

KAPITUL 2

OG aftur fór hann inn í Că-pĕr´-nă-ŭm, eftir *nakrar* dagar; og tað varð ljóðað, at hann var í húsinum.

2 Og beinanvegin vóru mong savnað saman, so mikið, at tað var einkið pláss at taka ímóti *teimum*, nei, ikki so mikið sum við dyrnar: og hann prædikaði teimum orðið.

3 Og teir koma til hansara, havandi *við sær* ein sjúkan av lamninginum, sum varð borin av fýra.

4 Og tá ið teir kundu ikki koma nær honum fyri troðkanini, dekkaðu teir tekjuna av, har hann var: og tá ið teir høvdu brotið *hana* upp, sigu teir niður seingina, í hvørji hin sjúki av lamninginum lá.

5 Tá ið Jesus sá trúgv teirra, segði hann við hin sjúka av lamninginum, Sonur, tínar syndir veri fyrigivnar tær.

6 Men tað sótu ávísir av hinum skriftlærdu har, og grundandi í hjørtum sínum,

7 Hví talar hesin *maður* soleiðis Guðsspottanir? hvør kann fyrigeva syndir, uttan Guð eina?

8 Og við tað sama tá ið Jesus varnaðist í anda sínum, at teir soleiðis grundaðu innan í sær sjálvum, segði hann við teir, Hví grunda tit hesar lutir í hjørtum tykkara?

9 Hvørt er tað lættari at siga við hin sjúka av lamninginum, *Tínar* syndir veri fyrigivnar tær; ella at siga, Reis *teg*, og tak upp song tína, og gakk?

10 Men at tit mega vita, at Menniskjusonurin hevur mátt á jørð til at fyrigeva syndir, (*tá* sigur hann við hin sjúka av lamninginum,)

11 Eg sigi tær, Reis *teg*, og tak upp song tína, og far leið tína inn í hús títt.

12 Og í stundini reistist hann, tók upp seingina, og fór út frammi fyri teim øllum; so mikið, at tey vórðu øll ovfarin, og dýrðmettu Guð, sigandi, Vit sóu tað aldri á hetta snið.

13 Og hann fór fram aftur við sjóvarmálan; og øll mannfjøldin leitaði til hansara, og hann lærdi tey.

14 Og sum hann fór framvið, sá hann Levī, *son* Ăl-phæ´-ŭs-ar, sitandi við tollheimtu*búði*na, og segði við hann, Fylg mær. Og hann reistist og fylgdi honum.

15 Og tað bar á, at sum Jesus sat til matar í húsi hansara, sótu mangir tollarar og syndarar eisini saman við Jesusi og lærusveinum hansara: tí at har vóru mangir, og teir fylgdu honum.

16 Og tá ið teir skriftlærdu og Pharisēararnir sóu hann eta við tollarum og syndarum, søgdu teir við lærusveinar hansara, Hvussu er tað, at hann etur og drekkur við tollarum og syndarum?

17 Tá ið Jesus hoyrdi *tað*, sigur hann við teir, Teir, sum eru heilir, hava ongan tørv á læknanum, men teir, sum eru sjúkir: Eg kom ikki at kalla hinar rættvísu, men syndarar til umvendingar.

18 Og lærusveinarnir hjá Jóhannesi og Pharisēarunum plagdu at fasta: og teir koma og siga við hann, Hví fasta lærusveinarnir hjá Jóhannesi og hjá Pharisēarunum, men lærusveinar tínir fasta ikki?

19 Og Jesus segði við teir, Kunnu brúðarkamars-børnini fasta, meðan brúðgómurin er hjá teimum? so leingi sum tey hava brúðgómin hjá sær, kunnu tey ikki fasta.

20 Men teir dagar vilja koma, tá ið brúðgómurin skal verða tikin burtur frá teimum, og tá skulu tey fasta í teimum døgum.

21 Eingin maður eisini seymar eitt stykki av nýggjum toyi á eitt

gamalt klæði: annars tekur tað nýggja stykkið, sum fylti tað upp, burtur úr tí gamla, og skræðingin verður gjørd verri.

22 Og eingin maður koyrir nýtt vín í gamlar kíkar: annars brestur tað nýggja vínið kíkarnar, og vínið stoytist, og kíkarnir skemmast: men nýtt vín má verða koyrt í nýggjar kíkar.

23 Og tað bar á, at hann fór í gjøgnum kornakrarnar á sabbatsdeginum; og hansara lærusveinar byrjaðu, sum teir ferðaðust, at slíta øksini av korni.

24 Og Pharisēararnir søgdu við hann, Sí, hví gera teir á sabbatsdeginum tað, sum er ikki lógligt?

25 Og hann segði við teir, Hava tit aldri lisið, hvat Dávid gjørdi, tá ið hann hevði tørv, og var ein hungraður, hann, og teir sum við honum vóru?

26 Hvussu hann fór inn í hús Guðs á døgum Ā-bī-ă-thâr-s høvuðsprestsins, og át sýnisbreyðini, sum er ikki lógligt at eta uttan hjá prestunum, og gav eisini til teirra sum við honum vóru?

27 Og hann segði við teir, Sabbaturin varð gjørdur fyri mann*in*, og ikki maður*in* fyri sabbatin:

28 Tessvegna er Menniskjusonurin Harri eisini hjá sabbatinum.

KAPITUL 3

OG hann fór aftur inn í sýnagoguna; og tað var ein maður har, sum hevði eina visnaða hond.

2 Og teir eygleiddu hann, hvørt hann vildi gróða hann á sabbatsdeginum; at teir máttu ákæra hann.

3 Og hann sigur við mannin sum hevði ta visnaðu hondina, Statt fram.

4 Og hann sigur við teir, Er tað lógligt at gera gott á sabbatsdøgunum, ella at gera ilt? at frelsa lív, ella at drepa? Men teir hildu friði sínum.

5 Og tá ið hann hevði litið runt íkring at teimum við vreiði, verandi harmur fyri harðleikan av hjørtum teirra, sigur hann við mannin, Strekk fram hond tína. Og hann strekti *hana* út: og hond hansara varð gjørd aftur heil, eins og hīn.

6 Og Pharisēararnir fóru út, og hildu beinanvegin ráð saman við Hē-ró´-di-ăr-unum ímóti honum, hvussu teir máttu oyða hann.

7 Men Jesus hevði seg undan við sínum lærusveinum til sævarins: og ein mikil mannfjøld úr Galilēu fylgdi honum, og úr Judǣu,

8 Og úr Jerusalem, og úr Î-dûmǣ´-ŭ, og *frá* handanfyri Jordan; og tey kring Týrus og Sī´-dŏn, ein mikil mannfjøld, tá ið tey høvdu hoyrt hvørjar miklar lutir hann gjørdi, komu til hansara.

9 Og hann talaði til lærusveina sína, at ein lítil bátur skuldi bíða eftir honum orsakað av mannfjøldini, at ikki tey skuldu treingja hann.

10 Tí at hann hevði grøtt mong; so mikið, at tey troðkaðust uppá hann, fyri at nema við hann, so mong sum høvdu plágur.

11 Og óreinir andar, tá ið teir sóu hann, fullu niður frammi fyri honum, og rópaðu, sigandi, Tú ert Sonur Guðs.

12 Og hann strangligani álegði teimum, at teir skuldu ikki gera hann kunnan.

13 Og hann fer niðan á eitt fjall, og kallar *til sín* hvønn hann vildi: og teir komu til hansara.

14 Og hann innsetti tólv, at teir skuldu vera við honum, og at hann kundi senda teir út at prædika,

15 Og at hava mátt til at gróða sjúkdómar, og at kasta út djevlar:

16 Og Símun tilnevndi hann Pætur;

17 Og Jákob, *son* Zĕb-ĕ-dēē´-ŭs-ar;

og Jóhannes, bróður Jákobs; og hann tilnevndi teir Bō-â-nĕr´-gĕs, sum er, Torusynirnir:

18 Og Andreas; og Philippus; og Bartholomæus; og Matthæus; og Tummas; og Jákob, *son* Ăl-phæ´-ŭs-ar; og Thăd-dæ´-ŭs; og Símun Cānaanitan;

19 Og Judas Iscariot, sum eisini sveik hann: og teir fóru inn í eitt hús.

20 Og mannamúgvan kemur saman aftur, so at teir kundu ikki so mikið sum eta breyð.

21 Og tá ið hansara vinir hoyrdu *um tað*, fóru teir út at leggja hald á hann: tí at tey søgdu, Hann er frá sær sjálvum.

22 ¶ Og hinir skriftlærdu, sum komu oman frá Jerusalem, søgdu, Hann hevur Bē-ĕl´-zĕ-bŭb, og við prinsi djevlanna kastar hann út djevlar.

23 Og hann kallaði teir *til sín*, og segði við teir í dømisøgum, Hvussu kann Satan kasta út Satan?

24 Og um eitt kongadømi veri sundurdeilt ímóti sær sjálvum, *tá* kann tað kongadømið ikki standast.

25 Og um eitt hús veri sundurdeilt ímóti sær sjálvum, *tá* kann tað húsið ikki standast.

26 Og um Satan rísi upp ímóti sær sjálvum, og verði *seg* sundurdeildur, *tá* kann hann ikki standast, men fær ein enda.

27 Eingin maður kann fara inn í húsið hjá einum sterkum manni, og ræna ognir hansara, uttan hann fyrst bindi hin sterka mannin; og tá vil hann ræna hús hansara.

28 Sanniliga sigi eg tykkum, Allar syndir skulu verða fyrigivnar mannasonunum, og Guðsspottanir, við hvørjumsumhelst teir skulu Guðsspotta:

29 Men hann, sum skal Guðsspotta ímóti Halga Andanum, hevur aldri fyrigeving, men er í vanda fyri ævigari heldøming:

30 Av tí at teir søgdu, Hann hevur ein óreinan anda.

31 ¶ Har komu tá bróður hansara og móðir hansara, og, standandi fyri uttan, sendu til hansara, kallandi hann.

32 Og mannamúgvan sat íkring hann, og tey søgdu við hann, Sí, móðir tín og bróður tínir fyri uttan søkja teg.

33 Og hann svaraði teimum, sigandi, Hvør er móðir mín, ella bróður mínir?

34 Og hann hugdi runt umkring á tey sum sótu um hann, og segði, Sí móður mína og bróður mínar!

35 Tí at hvørsumhelst *ið* skal gera vilja Guðs, hin sami er bróðir mín, og systir mín, og móðir mín.

KAPITUL 4

OG hann fór aftur undir at frálæra við sjóvarmálan: og tað var savnað at honum ein mikil mannfjøld, so at hann fór inn í ein bát, og sat í sjónum; og øll mannfjøldin var við sjógvin á landinum.

2 Og hann lærdi tey mong ting við^ dømisøgum, og segði við tey í síni Guðslæru,

3 Lýðið á; Sí, tað fór út ein sáðmaður at sáa:

4 Og tað bar á, sum hann sáaði, sumt fell við vegkantin, og fuglar luftarinnar komu og gloyptu tað upp.

5 Og sumt fell á grýtuta jørð, har tað ikki hevði nógva mold; og alt fyri eitt spratt tað upp, av tí at tað onga dýpd av mold hevði:

6 Men tá ið sólin var uppi, varð tað *av*sviðið; og, av tí at tað onga rót hevði, følnaði tað burtur.

7 Og sumt fell millum torna, og tornirnir vuksu upp, og køvdu tað, og tað gav av sær ongan ávøkst.

8 Og annað fell á góða jørð, og gav av sær ávøkst, sum spratt upp og tók til; og bar fram, sumt tríati, og sumt seksti, og sumt hundrað.

9 Og hann segði við tey, Hann, ið hevur oyru at hoyra, lat hann hoyra.

10 Og tá ið hann var einsamallur, spurdu teir, sum vóru um hann, við teimum tólv, hann um dømisøguna.

11 Og hann segði við teir, Tykkum er tað givið at kenna loyndardóm kongadømis Guðs: men teimum, sum eru uttanfyri, verða øll *hesi* tingini gjørd í dømisøgum:

12 At síggjandi tey mega síggja, og ikki varnast; og hoyrandi tey mega hoyra, og ikki skilja; at ikki á nakrari tíð tey skuldu verðið umvend, og *teirra* syndir skuldu verðið fyrigivnar teimum.

13 Og hann segði við teir, Skyna tit ikki hesa dømisøgu? og hvussu skulu tit tá skyna allar dømisøgur?

14 ¶ Sáðmaðurin sáar orðið.

15 Og hesi eru tey við vegkantin, har orðið verður sáað; men tá ið tey hava hoyrt, kemur Satan alt fyri eitt, og tekur burtur orðið sum varð sáað í hjørtu teirra.

16 Og hesi eru tey líkaleiðis, sum verða sáaði á grýtuta jørð; hvørji, tá ið tey hava hoyrt orðið, alt fyri eitt taka við tí við gleði;

17 Og hava onga rót í sær sjálvum, og so halda út bert í eina tíð: síðan, tá ið líðing ella atsókn rísur upp fyri orðsins skuld, alt fyri eitt fáa tey meinboga.

18 Og hesi eru tey sum verða sáaði millum torna; slík sum hoyra orðið,

19 Og stúranirnar av hesum heimi, og svikafullsemin av ríkidømum, og girndirnar eftir øðrum tingum, farandi inn, køva orðið, og tað gerst ófruktsamt.

20 Og hesi eru tey sum verða sáaði á góða jørð; slík sum hoyra orðið, og taka við *tí,* og bera fram ávøkst, summi tríatifaldan, summi seksti, og summi hundraðfaldan.

21 ¶ Og hann segði við teir, Verður eitt kertaljós ført *fram* til at verða sett undir eitt skeppumál, ella undir eina song? og ikki til at verða sett í ein kertastaka?

22 Tí at einkið er fjalt, sum skal ikki verða eyðsýnað; eiheldur varð nakað ting hildið loynt, uttan at tað skuldi koma útumkring.

23 Um nakar maður havi oyru at hoyra, lat hann hoyra.

24 Og hann segði við teir, Gevið gætur hvat tit hoyra: við tí máli tit måla, skal tað verða målt til tykkara: og tykkum, sum hoyra, skal meira verða givið.

25 Tí at hann ið hevur, til hansara skal verða givið: og hann ið hevur ikki, frá honum skal verða tikið enntá tað sum hann hevur.

26 ¶ Og hann segði, Soleiðis er kongadømi Guðs, sum um ein maður skuldi kastað sáð í jørðina;

27 Og skuldi sovið, og risið nátt og dag, og sáðið skuldi sprottið og vaksið upp, hann veit ikki hvussu.

28 Tí at jørðin ber fram ávøkst av sær sjálvari; fyrst nálina, síðan aksið, eftir tað tað fulla kornið í aksinum.

29 Men tá ið ávøksturin er borin fram, alt fyri eitt setur hann akurknívin til, av tí at heystið er komið.

30 ¶ Og hann segði, Hvørjum skulu vit líkna kongadømi Guðs? ella við hvørji samanbering skulu vit samanbera tað?

31 *Tað er* líka *sum* eitt sinopskorn, sum, tá ið tað verður sáað í jørðina, er minni enn øll sáðkornini sum veri *seg* á jørðini:

32 Men tá ið tað er sáað, veksur

tað upp, og verður størri enn allar urtir, og skjýtur út miklar greinar; so at fuglar luftarinnar mega búleikast undir skugganum av tí.

33 Og við mongum slíkum dømisøgum talaði hann orðið til teirra, sum tey vóru før fyri at hoyra *tað*.

34 Men uttan dømisøgu talaði hann ikki til teirra: og tá ið teir vóru einsamallir, útlegði hann øll ting fyri lærusveinum sínum.

35 Og hin sama dagin, tá ið aftanin var komin, sigur hann við teir, Latum okkum fara yvirum hînumegin.

36 Og tá ið teir høvdu sent avstað mannfjøldina, tóku teir hann enntá sum hann var inn í bátin. Og tað vóru eisini við honum aðrir lítlir bátar.

37 Og tað reistist ein mikil stormur í vindi, og aldurnar brutu inn í bátin, so at hann var nú fullur.

38 Og hann var í tí aftara partinum av bátinum, sovandi á einum kodda: og teir vekja hann, og siga við hann, Meistari, leggurt tú ikki í at vit glatast?

39 Og hann reistist, og hartaði vindin, og segði við sjógvin, Friður, ver stillur. Og vindurin steðgaði, og tað varð blikalogn.

40 Og hann segði við teir, Hví eru tit so óttafullir? hvussu er tað, at tit hava onga trúgv?

41 Og teir óttaðust ovurhondsligani, og søgdu hvør til annars, Hvørsháttar maður er hesin, at sjálvt vindurin og sjógvurin lýða hann?

KAPITUL 5

OG teir komu yvirum hînumegin sjógvin, inn í landið hjá Găd-ă-rēn'-unum.

2 Og tá ið hann var komin út úr bátinum, møtti honum við tað sama úr grøvunum ein maður við einum óreinum anda,

3 Sum hevði *sín* bústað millum gravirnar; og eingin maður kundi binda hann, nei, ikki við ketum:

4 Av tí at hann hevði ofta verið bundin við fótjørnum og ketum, og keturnar høvdu verðið slitnar sundur av honum, og fótjørnini brotin í stykkir: eiheldur kundi nakar *maður* temja hann.

5 Og altíð, nátt og dag, var hann í fjøllunum, og í grøvunum, geylandi, og skerandi seg sjálvan við steinum.

6 Men tá ið hann sá Jesus langt burturifrá, rann hann og tilbað hann,

7 Og rópti við harðari rødd, og segði, Hvat havi eg at gera við teg, Jesus, *tú* Sonur hins hægsta Guðs? Eg svørji teg við Guð, at tú pínsli meg ei.

8 Tí hann segði við hann, Kom út úr manninum, *tú* óreini andi.

9 Og hann spurdi hann, Hvat *er* navn títt? Og hann svaraði, sigandi, Mítt navn *er* Legión: tí at vit eru mangir.

10 Og hann bønaði hann mikið, at hann vildi ikki senda teir avstað út úr land*umráð*inum.

11 Nú, har var nær við fjøllini eitt stórt fylgi av svínum á biti.

12 Og allir djevlarnir bønaðu hann, sigandi, Send okkum inn í svínini, at vit mega fara inn í tey.

13 Og við tað sama gav Jesus teim loyvi. Og teir óreinu andarnir fóru út, og fóru inn í svínini: og fylgið rann harðligani oman eitt bratt stað inn í sjógvin, (tey vóru um tvey túsund;) og vórðu kódnað í sjónum.

14 Og teir, sum føddu svínini, flýddu, og søgdu frá *tí* í staðinum, og á landinum. Og tey fóru út at síggja hvat tað var sum var gjørt.

15 Og tey koma til Jesu, og síggja hann sum var heltikin við djevlinum, og hevði legiónina, sitandi, og klæddan, og í sínum rætta sinni: og tey vórðu rædd.

16 Og teir, sum sóu *tað*, søgdu teimum hvussu tað viðfórst honum sum var heltikin við djevlinum, og *eisini* viðvíkjandi svínunum.
17 Og tey byrjaðu at biðja hann fara burtur út úr breddum sínum.
18 Og tá ið hann var komin inn í bátin, bað hann, sum hevði verið heltikin við djevlinum, hann, at hann mátti verið hjá honum.
19 Hvussu enn er, Jesus loyvdi honum ikki, men sigur við hann, Far heim til vina tína, og sig teimum hvussu mikil ting Harrin hevur gjørt fyri teg, og hevur havt várkunn yvir teg.
20 Og hann fór avstað, og tók at kunngera í Dê-câ-pō´-līs, hvussu mikil ting Jesus hevði gjørt fyri seg: og allir *menn* undraðust.
21 Og tá ið Jesus var farin yvirum hīnumegin aftur við báti, savnaðist mikið fólk at honum: og hann var nær sjónum.
22 Og sí, har kemur ēin av stjórnarunum av sýnagoguni, Jâī´-rūs at navni; og tá ið hann sá hann, fell hann við føtur hansara,
23 Og bønaði hann mikið, sigandi, Mín lítla dóttir liggur fyri deyðanum: *Eg biði teg*, kom og legg tínar hendur á hana, at hon má verða grødd; og hon skal liva.
24 Og *Jesus* fór við honum; og mikið fólk fylgdi honum, og trongdi hann.
25 Og ein ávís kvinna, sum hevði blóðgang tólv ár,
26 Og hevði útstaðið mong ting av mongum læknum, og hevði brúkt alt tað hon hevði, og var einkið batnað, men heldur gjørdist verri,
27 Tá ið hon hevði hoyrt um Jesus, kom í troðkanum aftanfyri, og nam við klæði hansara.
28 Tí at hon segði, Um eg má nema bert við hansara klæði, *so* skal eg verða heil.
29 Og beinanvegin varð hennara blóðkelda tornað upp; og hon kendi í *sínum* kroppi, at hon var grødd frá teirri pláguni.
30 Og Jesus, í stundini kennandi í sær sjálvum at magn var farið út úr sær, vendi sær við í troðkanum, og segði, Hvør nam við klæðir míni?
31 Og hansara lærusveinar søgdu við hann, Tú sært mannfjøldina treingjandi teg, og sigurt tú, Hvør nam við meg?
32 Og hann hugdi runt umkring at síggja hana sum hevði gjørt hetta ting.
33 Men kvinnan, óttandi og piprandi, vitandi hvat var gjørt í sær, kom og fell niður frammi fyri honum, og segði honum allan sannleikan.
34 Og hann segði við hana, Dóttir, trúgv tín hevur gjørt teg heila; far í friði, og ver heil frá plágu tíni.
35 Meðan hann enn talaði, komu frá *húsinum* hjá stjórnaranum av sýnagoguni *ávísir* sum søgdu, Dóttir tín er deyð: hví órógvart tú Meistaran longur?
36 So skjótt sum Jesus hoyrdi orðið sum varð talað, sigur hann við stjórnaran av sýnagoguni, Ver ikki ræddur, trúgv einans.
37 Og hann loyvdi ongum manni at fylgja sær, uttan Pæturi; og Jákobi; og Jóhannesi, bróður Jákobs.
38 Og hann kemur til húss stjórnarans av sýnagoguni, og sær hávan, og tey sum grótu og venaðu stórliga.
39 Og tá ið hann var komin inn, sigur hann við tey, Hví leika tit so í, og gráta? gentan er ikki deyð, men svevur.
40 Og tey læðu hann í háð. Men tá ið hann hevði sent tey øll út, tekur hann faðirin og móðurina at gentuni, og teir sum vóru við honum, og fer inn har *sum* gentan lá.

41 Og hann tók í hondina á gentuni, og segði við hana, Tăl-ĭ-thă cŭ-mī; sum er, verðandi týtt, Genta, eg sigi tær, reis *teg*.
42 Og beinanvegin reistist gentan, og gekk; tí at hon var *av aldrinum* tólv ár. Og tey vórðu ovfarin við miklum ovfarni.
43 Og hann álegði teimum strangliga, at eingin maður skuldi vita tað; og beyð, at okkurt skuldi verða givið henni at eta.

KAPITUL 6

OG hann fór út haðani, og kom inn í sítt egna land; og hansara lærusveinar fylgja honum.
2 Og tá ið sabbatsdagurin var komin, fór hann undir at frálæra í sýnagoguni: og mong, hoyrandi *hann,* vórðu bilsin, sigandi, Hvaðani hevur hesin *maður* hesi ting? og hvør vísdómur *er* hetta sum er givin honum, at enntá slík mektig verk verða virkaði av hondum hansara?
3 Er ikki hetta træsmiðurin, sonur Mariu, bróðir Jákobs, og Jó-sĕs-ar, og Juda, og Símunar? og eru ikki hansara systrar her hjá okkum? Og tey tóku meinboga av honum.
4 Men Jesus segði við tey, Ein prophetur er ikki uttan heiður, uttan í sínum egna landi, og millum sítt egna skyldfólk, og í sínum egna húsi.
5 Og hann kundi har ikki gera nakað mektugt verk, uttan at hann legði sínar hendur uppá nøkur fá sjúk fólk, og grøddi *tey*.
6 Og hann undraðist, grundað á teirra vantrúgv. Og hann fór runt umkring bygdirnar, frálærandi.
7 ¶ Og hann kallaði *til sín* teir tólv, og fór undir at senda teir út sum tveir og tveir; og gav teim mátt yvir óreinum andum;
8 Og beyð teimum, at teir skuldu einkið taka til ferð *sína,* uttan stav einans; ongan pjøka, einkið breyð, ongan pening í *sín* pengapung:
9 Men *vera* skøddir við sandalum; og ei fara í tvær kápur.
10 Og hann segði við teir, Í hvørjum staði sumhelst *ið* tit fara inn í eitt hús, har verðið *verandi* til tit fara avstað frá tí staði.
11 Og hvørsumhelst *ið* skal ikki taka ímóti tykkum, ella hoyra tykkum, tá ið tit fara avstað haðani, ristið støvið av undan fótum tykkara til ein vitnisburð ímóti teimum. Sanniliga sigi eg tykkum, Tað skal vera meiri úthaldiligt hjá Sodomu og Gō-mŏr′-rhŭ á dómsdeginum, enn hjá tí staðinum.
12 Og teir fóru út, og prædikaðu at menn skuldu venda um.
13 Og teir kastaðu út mangar djevlar, og salvaðu við olju mong sum vóru sjúk, og grøddu *tey*.
14 Og Heródes kongur hoyrdi *um hann;* (tí hansara navn varð spreitt umkring:) og hann segði, At Jóhannes Doyparin var risin frá teimum deyðu, og tí sýna fram seg sjálv mektig verk í honum.
15 Aðrir søgdu, At tað er Ē-lī′-ăs. Og aðrir søgdu, At tað er ein prophetur, ella sum ēin av prophetunum.
16 Men tá ið Heródes hoyrdi *um tað,* segði hann, Tað er Jóhannes, sum eg hálshøgdi: hann er risin frá teimum deyðu.
17 Tí at Heródes sjálvur hevði sent út og lagt hald á Jóhannes, og bundið hann í fongsli fyri skuld Hĕ-ró-dī′-ăs-ar, konu Philippusar, bróðurs síns: tí at hann hevði gift *seg* við henni.
18 Tí Jóhannes hevði sagt við Heródes, Tað er ikki lógligt hjá tær at hava konu bróðurs tíns.
19 Tí hevði Hĕ-ró-dī′-ăs trætumál ímóti honum, og vildi havt dripið hann; men hon kundi ikki:
20 Tí Heródes óttaðist Jóhannes, vitandi, at hann var ein rætt-

vísur maður og ein heilagur, og ansaði hann; og tá ið hann hoyrdi hann, gjørdi hann mong ting, og hoyrdi hann fegin.

21 Og tá ið ein lagaligur dagur var komin, at Heródes á sínum føðingardegi gjørdi ein kvøldverð fyri sínum aðalsmonnum, høgu herovastum, og hægst *standandi* av Galilēu;

22 Og tá ið dóttir *áður* nevndu Hē-ró-dī´-ās-ar kom inn, og dansaði, og toknaði Heródesi og teimum ið sótu við honum, segði kongur við gentuna, Umbið frá mær hvatsumhelst tú vilt, og eg vil geva *tað* tær.

23 Og hann svór henni, Hvatsumhelst *ið* tú skalt umbiðja av mær, eg vil geva *tað* tær, at helmingi kongadømis míns.

24 Og hon fór fram, og segði við móður sína, Hvat skal eg umbiðja? Og hon segði, Høvur Jóhannesar Doyparans.

25 Og hon kom inn beinanvegin við skundi til kongsins, og umbað, sigandi, Eg vil, at tú gevurt mær við tað sama á einum fati høvdið á Jóhannesi Doyparanum.

26 Og kongur varð avbera syrgin; *tó,* fyri eiðar síns skuld, og fyri sakir teirra sum sótu við honum, vildi hann ikki avvísa hana.

27 Og í stundini sendi kongur ein avrættara, og skipaði hansara høvur at verða fingið: og hann fór og hálshøgdi hann í fongslinum,

28 Og førdi hans høvur á einum fati, og gav tað til gentuna: og gentan gav tað til móður sína.

29 Og tá ið hansara lærusveinar hoyrdu *um tað,* komu teir og tóku upp lík hansara, og løgdu tað í eina grøv.

30 Og ápostlarnir savnaðu seg saman at Jesusi, og søgdu honum øll ting, bæði hvat teir høvdu gjørt, og hvat teir høvdu frálært.

31 Og hann segði við teir, Komið tit sjálvir burturfrá inn á eitt oyðistað, og hvílið eina løtu: tí at mong vóru komandi og farandi, og teir høvdu onga frítíð so mikið sum til at eta.

32 Og teir fóru avstað inn á eitt oyðistað við báti ēinsærisliga.

33 Og fólkið sá teir farandi avstað, og mong kendu hann, og runnu til fóts hagar út úr øllum staðum, og komu undan teimum, og komu saman at honum.

34 Og Jesus, tá ið hann kom út, sá mikið fólk, og varð rørdur við várkunn mótvegis teimum, av tí at tey vóru sum seyðir, ei havandi hirða: og hann fór undir at læra tey mong ting.

35 Og tá ið dagurin var nú langt brúktur, komu hansara lærusveinar at honum, og søgdu, Hetta er eitt oyðistað, og nú *er* tíðin langt liðin:

36 Send tey avstað, at tey mega fara inn í landið her runt umkring, og inn í bygdirnar, og keypa sær breyð: tí at tey hava einkið at eta.

37 Hann svaraði og segði við teir, Gevið tit teimum at eta. Og teir siga við hann, Skulu vit fara og keypa tvey hundrað denara virði av breyði, og geva teimum at eta?

38 Hann sigur við teir, Hvussu mong breyð hava tit? farið og vitið. Og tá ið teir vitstu, siga teir, Fimm, og tveir fiskar.

39 Og hann skipaði teimum at fáa øll *at* setast niður í flokkum uppá tað grøna grasið.

40 Og tey settust niður í raðum, við^ hundraðum, og við^ fimtium.

41 Og tá ið hann hevði tikið tey fimm breyðini og teir báðar fiskarnar, hugdi hann upp til himins, og vælsignaði, og breyt breyðini, og gav *tey* til lærusveina sína at seta frammanfyri teimum; og teir báðar fiskarnar deildi hann millum tey øll.

42 Og tey ótu øll, og vórðu mettað.

43 Og teir hentaðu upp tólv tægur fullar av molunum, og av fiskunum.
44 Og teir, sum ótu av breyðunum, vóru umleið fimm túsund menn.
45 Og beinanvegin noyddi hann lærusveinar sínar at fara inn í bátin, og at fara yvirum hīnumegin undan til Bĕth-să´-ī-dŭ, meðan hann sendi burtur fólkið.
46 Og tá ið hann hevði sent tey burtur, fór hann avstað á eitt fjall at biðja.
47 Og tá ið aftan var komin, var báturin á miðjum sjógvinum, og hann einsamallur á landinum.
48 Og hann sá teir stríðandi í róðuri; tí at vindurin var andstøðis teimum: og um hina fjórðu náttarvøku kemur hann til teirra, gangandi uppiá sjógvinum, og vildi havt farið framvið teimum.
49 Men tá ið teir sóu hann gangandi uppiá sjógvinum, hildu teir *at* tað hevði verið ein andi, og rópaðu út:
50 Tí at teir sóu hann allir, og vórðu órógvaðir. Og í stundini talaði hann við teir, og sigur við teir, Verið við gott treyst: tað eri eg; verið ikki ræddir.
51 Og hann fór upp til teirra inn í bátin; og vindurin steðgaði: og teir vóru sára ógvaðir í sær sjálvum útum mát, og undraðust.
52 Tí at teir hugleiddu ikki *kraftarverk* breyðanna: tí at teirra hjarta var hert.
53 Og tá ið teir vóru farnir yvirum, komu teir inn í land Gĕnnĕs´-â-rĕt-s, og drógu til strandar.
54 Og tá ið teir vóru komnir út úr bátinum, beinanvegin kendu tey hann,
55 Og runnu ígjøgnum alt umráðið runt umkring, og tóku at bera um í songum tey sum vóru sjúk, har tey hoyrdu hann var.
56 Og hvagarsumhelst *ið* hann fór inn, inn í bygdir, ella staðir, ella garð, løgdu tey tey sjúku á gøturnar, og bønaðu hann, at tey máttu nema, um tað var bert *við* faldin á klæði hansara: og so mong, sum nomu við hann, vórðu gjørd heil.

KAPITUL 7

TÁ komu saman til hansara Pharisēararnir, og ávísir av hinum skriftlærdu, sum komu frá Jerusalem.
2 Og tá ið teir sóu summar av hansara lærusveinum eta breyð við óreinum, tað vil siga, við ótváaðum hondum, funnu teir feil.
3 Tí at Pharisēararnir, og allir Jødarnir, uttan teir tvái *sínar* hendur ofta, eta ikki, haldandi sið hinna eldru.
4 Og *tá ið teir koma* av torginum, uttan teir tvái *sær*, eta teir ikki. Og mong onnur ting tað veri *seg* sum teir hava tikið við at halda, *so sum* tváingin av bikørum, og grýtum, kopar íløtum, og av borðum.
5 Tá spurdu Pharisēararnir og hinir skriftlærdu hann, Hví ganga ikki tínir lærusveinar samsvarandi við sið hinna eldru, men eta breyð við ótváaðum hondum?
6 Hann svaraði og segði við teir, Væl hevur Ê-sāĭ´-ăs propheterað um tykkum hyklarar, sum skrivað stendur, Hetta fólk ærir meg við *sínum* vørrum, men teirra hjarta er fjart frá mær.
7 Hvussu enn er, til fánýtis tilbiðja tey meg, frálærandi *fyri* Guðslærur boðini hjá monnum.
8 Tí at, leggjandi til viks boðið hjá Guði, halda tit siðin hjá monnum, *so sum* tváingina av grýtum og bikørum: og mong onnur slík ting gera tit.
9 Og hann segði við teir, Fullvæl vraka tit boðið hjá Guði, at tit mega halda tykkara egna sið.
10 Tí at Móses segði, Æra faðir tín og móður tína; og, Hvør*iðso*

bølbiður faðir ella móður, lat hann doyggja deyðan:
11 Men tit siga, Um ein maður skal siga til sín faðir ella móður, *Tað er* Côr´-băn, tað vil siga, ein gáva, við hvørjumsumhelst tú máttirt verðið gagnaður av mær; *hann skal vera fríur.*
12 Og tit loyva honum ikki meira at gera okkurt fyri faðir sín ella móður sína;
13 Gerandi Guðs orð av ongari virkni gjøgnum tykkara sið, sum tit hava avhandað: og mong tílík ting gera tit.
14 ¶ Og tá ið hann hevði kallað alt fólkið *til sín,* segði hann við tey, Lýðið á meg hvør *og* ēin *av tykkum,* og skiljið:
15 Tað er einkið uttanífrá einum manni, sum, farandi inn í hann, kann dálka hann: men tey tingini sum koma út úr honum, tey eru tey sum dálka mannin.
16 Um nakar maður havi oyru at hoyra, lat hann hoyra.
17 Og tá ið hann var farin inn í húsið frá fólkinum, spurdu hansara lærusveinar hann viðvíkjandi dømisøguni.
18 Og hann sigur við teir, Eru tit so uttan skil eisini? Fata tit ikki, at hvatsumhelst ting *sum* uttanífrá fer inn í mannin, *tað* kann ikki dálka hann;
19 Av tí at tað fer ikki inn í hjarta hansara, men inn í búkin, og fer út í frárenningina, reinskandi allar matir?
20 Og hann segði, Tað, sum kemur út úr manninum, tað dálkar mannin.
21 Tí at innanífrá, út úr hjartanum hjá monnum, útganga illar hugsanir, horfremjanir, leysalevnaðir, myrðir,
22 Tjóvaríir, ágirnd, vondska, tølan, skammloysi, eitt ónt eyga, Guðsspottan, hugmóð, fávitska:
23 Øll hesi illu tingini koma innanífrá, og dálka mannin.
24 ¶ Og haðani reistist hann, og fór inn í landamørkini av Týrus og Sī´-dŏn, og fór inn í eitt hús, og vildi hava ongan mann *at* vita *tað:* men hann kundi ei vera fjaldur.
25 Tí ein *ávís* kvinna, hvørs unga dóttir hevði ein óreinan anda, hoyrdi um hann, og kom og fell við hansara føtur:
26 Kvinnan var ein Grikkisk, ein Sý-rō-phø-nīkk´-īsk av tjóð; og hon bønaði hann, at hann vildi kastað djevulin út úr dóttur síni.
27 Men Jesus segði við hana, Lat børnini fyrst verða mettaði: tí at tað er ikki sømiligt at taka breyðið hjá børnunum, og at kasta *tað* yvirat hundunum.
28 Og hon svaraði og segði við hann, Ja, Harri: hundarnir undir borðinum tó eta av molunum hjá børnunum.
29 Og hann segði við hana, Fyri hesa framsøgn far tín veg; djevulin er farin út úr dóttur tíni.
30 Og tá ið hon var komin til húsa sína, fann hon djevulin farnan út, og sína dóttur lagsta uppiá seingini.
31 ¶ Og aftur, farandi avstað frá umráðunum av Týrus og Sī´-dŏn, kom hann at Galilēu-sjógvinum, ígjøgnum miðjuna av umráðum Dê-cā-pō´-līs.
32 Og tey føra at honum ēin sum var deyvur, og hevði eitt brek í talu síni; og tey bøna hann at leggja sína hond uppá hann.
33 Og hann tók hann til viks frá mannamúgvuni, og stakk sínar fingrar inn í oyru hansara, og hann spýtti, og nam við tungu hansara;
34 Og, lítandi upp til himins, suffaði hann, og sigur við hann, Ēph´-phă-thă, tað er, Verð opnað.
35 Og beinanvegin vórðu hans oyru opnaði, og hansara tunguband varð loyst, og hann talaði raðið.
36 Og hann álegði teimum, at

tey skuldu ongum manni siga *frá:* men tess meira hann álegði teimum, so mikið meira ríkiligani kunngjørdu tey *tað;*

37 Og vóru út um mát bilsin, sigandi, Hann hevur gjørt øll ting væl: hann fær bæði tey deyvu at hoyra, og tey málleysu at tala.

KAPITUL 8

Í TEIMUM døgum, mannfjøldin verandi sera mikil, og havandi einkið at eta, kallaði Jesus sínar lærusveinar *til sín,* og sigur við teir,

2 Eg havi várkunn á mannamúgvuna, av tí at tey hava nú verið hjá mær tríggjar dagar, og hava einkið at eta:

3 Og um eg sendi tey avstað fastandi til egnu húsa sína, vilja tey maktast eftir veginum: tí at ymis teirra komu fjarvegis frá.

4 Og hansara lærusveinar svaraðu honum, Hvaðani kann maður metta hesar *menn* við breyði her í oyðuni?

5 Og hann spurdi teir, Hvussu mong breyð hava tit? Og teir søgdu, Sjey.

6 Og hann beyð fólkinum at setast niður á jørðina: og hann tók tey sjey breyðini, og veitti tøkkir, og breyt, og gav til lærusveina sína at seta frammanfyri *teimum;* og teir settu *tey* frammanfyri fólkinum.

7 Og teir høvdu nakrar smáar fiskar: og hann vælsignaði, og beyð at seta teir eisini frammanfyri *teimum.*

8 So tey ótu, og vórðu mettaði: og teir tóku upp av tí brotna *matinum,* sum var eftir, sjey tægur.

9 Og teir, sum høvdu etið, vóru um fýra túsund: og hann sendi tey avstað.

10 ¶ Og beinanvegin fór hann inn í ein bát við lærusveinum sínum, og kom inn í partarnar av Dăl-mă-nŭ´-thă.

11 Og Pharisēararnir komu fram, og byrjaðu at spyrjast við hann, søkjandi av honum eitt tekin frá himni, freistandi hann.

12 Og hann suffaði djúpligani í sínum anda, og sigur, Hví søkir henda ætt eftir einum tekini? sanniliga sigi eg tykkum, Tað skal einkið tekin verða givið hesi ætt.

13 Og hann fór frá teimum, og, farandi inn í bátin aftur, fór avstað yvirum hīnumegin.

14 ¶ Nú, *lærusveinarnir* høvdu gloymt at tikið breyð, eiheldur høvdu teir í bátinum við sær meiri enn ēitt heilbreyð.

15 Og hann álegði teimum, sigandi, Gevið gætur, verið varnir fyri súrdeiggi Pharisēaranna, og *fyri* súrdeiggi Heródesar.

16 Og teir tingaðust sín ámillum, sigandi, *Tað er* av tí at vit einkið breyð hava.

17 Og tá ið Jesus vitsti *tað,* sigur hann við teir, Hví tingast tit, av tí at tit einkið breyð hava? fata tit ikki enn, eiheldur skilja? hava tit tykkara hjarta enn hert?

18 Havandi eygu, síggja tit ikki? og havandi oyru, hoyra tit ikki? og minnast tit ikki?

19 Tá ið eg breyt tey fimm breyðini millum fimm túsunda, hvussu mangar tægur fullar av molum hentaðu tit upp? Teir siga við hann, Tólv.

20 Og tá ið tey sjey millum fýra túsunda, hvussu mangar tægur fullar av molum hentaðu tit upp? Og teir søgdu, Sjey.

21 Og hann segði við teir, Hvussu er tað at tit ikki skilja?

22 ¶ Og hann kemur til Bĕth-să´-ĭ-dŭ; og tey føra ein blindan mann til hansara, og bønaðu hann at nema við hann.

23 Og hann tók í hondina á tí blinda manninum, og leiddi hann út úr býinum; og tá ið hann hevði spýtt á eygu hansara, og lagt sínar hendur uppá hann,

spurdi hann hann um hann sá okkurt.

24 Og hann hugdi upp, og segði, Eg síggi menn sum trø, gangandi.

25 Eftir tað legði hann *sínar* hendur aftur uppá eygu hansara, og fekk hann *at* hyggja upp: og hann varð endurbøttur, og sá hvønn mann klárliga.

26 Og hann sendi hann avstað heim til húsar hansara, sigandi, Hvørki far inn í býin, ella sig *tað* fyri nøkrum í býinum.

27 ¶ Og Jesus fór út, og hansara lærusveinar, inn í býirnar av Cæ-sâ-ré´-ŭ Philippī: og á veginum spurdi hann sínar lærusveinar, sigandi við teir, Hvønn siga menn at eg eri?

28 Og teir svaraðu, Jóhannes Doyparin: men summir *siga,* Ē-lī´-ăs; og aðrir, Ein av prophetunum.

29 Og hann sigur við teir, Men hvønn siga tit at eg eri? Og Pætur svarar og sigur við hann, Tú ert Christus˘.

30 Og hann álegði teimum, at teir ongum manni skuldu siga frá um hann.

31 Og hann tók at læra teir, at Menniskjusonurin má líða mong ting, og verða vrakaður av teimum elstu, og *av* fremstu prestunum, og skriftlærdu, og verða dripin, og eftir tríggjar dagar rísa aftur.

32 Og hann talaði ta framsøgn opinlýsliga. Og Pætur tók hann, og fór undir at harta hann.

33 Men tá ið hann hevði vent *sær* við og hugt á sínar lærusveinar, hartaði hann Pætur, sigandi, Slepp tær afturum meg, Satan: tí at tú gáart ei eftir teim tingum sum veri av Guði, men eftir teim tingum sum veri av monnum.

34 ¶ Og tá ið hann hevði kallað fólkið *til sín* við sínum lærusveinum eisini, segði hann við tey, Hvørsumhelst *ið* vil koma aftaná mær, lat hann avnokta sjálvan seg, og taka upp kross sín, og fylgja mær.

35 Tí at hvørsumhelst *ið* vil frelsa sítt lív, skal missa tað; men hvørsumhelst *ið* skal missa sítt lív fyri mína skyld og gleðiboðskaparins, hin sami skal frelsa tað.

36 Tí at hvat skal tað gagna einum manni, um hann skal vinna heila heimin, og missa sína egnu sál?

37 Ella hvat skal maður geva í viðurlag fyri sína sál?

38 Hvørsumhelst tessvegna *ið* skal skammast við meg og við orðini hjá mær í hesi horfiknu og syndafullu ætt; við hann eisini skal Menniskjusonurin skammast, tá ið hann kemur í dýrd Faðirs síns við hinum heilagu einglum.

KAPITUL 9

OG hann segði við tey, Sanniliga sigi eg tykkum, At tað veri summi av teimum ið standa her, sum skulu ikki smakka av deyða, fyrrenn tey hava sæð kongadømi Guðs komið við kraft.

2 ¶ Og eftir seks dagar tekur Jesus *við sær* Pætur, og Jákob, og Jóhannes, og leiðir teir niðan á eitt høgt fjall einsamallar fyri seg sjálvar: og hann varð ummyndaður frammi fyri teimum.

3 Og hansara klædnabúni varð skínandi, avbera hvítur sum snjó; soleiðis sum eingin reinsari á jørð kann bleikja tey.

4 Og tað birtust teimum Ĕ-lī´-ăs við Mósesi: og teir vóru talandi við Jesus.

5 Og Pætur tók til orða og segði við Jesus, Meistari, tað er gott hjá okkum at vera her: og latum okkum gera trý tabernakkul; ēitt til tín, og ēitt til Mósesar, og ēitt til Ĕ-lī´-ăs-ar.

6 Tí hann vitsti ikki hvat sigast *átti;* tí at teir vóru sára ræddir.

7 Og har var eitt skýggj, sum skuggaði yvir teir: og ein rødd

kom út úr skýgginum, sigandi, Hesin er mín háttelskaði Sonur: hoyrið hann.

8 Og brádliga, tá ið teir høvdu hugt runt umkring, sóu teir ongan mann meira, uttan Jesus eina hjá teimum sjálvum.

9 Og sum teir komu oman av fjallinum, álegði hann teimum, at teir ongum manni skuldu siga frá, hvørji ting teir høvdu sæð, til Menniskjusonurin var risin frá teimum deyðu.

10 Og teir varðveittu ta framsøgnina hjá sær sjálvum, spyrjandi hvør við øðrum, hvat rísingin frá teimum deyðu mundi merkja.

11 ¶ Og teir spurdu hann, sigandi, Hví siga hinir skriftlærdu, at Ē-lĭ´-ăs má fyrst koma?

12 Og hann svaraði og segði teimum, Ē-lĭ´-ăs sanniliga kemur fyrst, og endurbøtir øll ting; og hvussu tað stendur skrivað um Menniskjusonin, at hann má líða mong ting, og verða gjørdur til einkiðs.

13 Men eg sigi tykkum, At Ē-lĭ´-ăs víst er komin, og teir hava gjørt við hann hvatsumhelst teim lysti, eins og skrivað stendur um hann.

14 ¶ Og tá ið hann kom til lærusveina *sína,* sá hann eina mikla mannamúgvu kring teir, og hinar skriftlærdu spyrjandi við teir.

15 Og beinanvegin øll fólkini, tá ið tey sóu hann, vórðu stórliga bilsin, og, rennandi til *hansara,* heilsaðu honum.

16 Og hann spurdi hinar skriftlærdu, Hvat spyrjast tit við teir?

17 Og ēin úr mannfjøldini svaraði og segði, Meistari, eg havi ført til tín son mín, sum hevur ein málleysan anda;

18 Og hvarsumhelst *ið* hann tekur hann, skræðir hann *í* hann: og hann skúmar, og gríslar við tonnum sínum, og kemur burtur í einkið: og eg talaði til lærusveina tína, at teir skuldu kasta hann út; og teir kundu ikki.

19 Hann svarar honum, og sigur, O trútóma ætt, hvussu leingi skal eg vera hjá tykkum? hvussu leingi skal eg tola tykkum? førið hann til mín.

20 Og teir førdu hann til hansara: og tá ið hann sá hann, beinanvegin skræddi andin *í* hann; og hann datt á jørðina, og veltist *og* skúmaði.

21 Og hann spurdi faðir hansara, Hvussu langt er tað síðani hetta kom til hansara? Og hann segði, Frá barni av.

22 Og mangan hevur hann kastað hann inn í eldin, og inn í vøtnini, at oyða hann: men um tú kanst gera nakað, hav várkunn á okkum, og hjálp okkum.

23 Jesus segði við hann, Um tú kanst trúgva, øll ting *eru* møgulig fyri honum sum trýr.

24 Og beinanvegin rópti barnsins faðir út, og segði við tárum, Harri, eg trúgvi; hjálp tú míni vantrúgv.

25 Tá ið Jesus sá, at fólkið kom rennandi saman, hartaði hann hin ekla andan, sigandi við hann, *Tú* málleysi andi og deyvi, eg áleggi tær, kom út úr honum, og far ikki meira inn í hann.

26 Og *andin* rópti, og skræddi *í* hann sáran, og kom út úr honum: og hann varð sum ēin deyður; so mikið, at mangir søgdu, Hann er deyður.

27 Men Jesus tók í hondina á honum, og lyfti hann upp; og hann reistist.

28 Og tá ið hann var komin inn í húsið, spurdu hansara lærusveinar hann ēinsærisligani, Hví kundu ikki vit kasta hann út?

29 Og hann segði við teir, Hetta slagið kann koma út við ongum, uttan við bøn og føstu.

30 ¶ Og teir fóru avstað haðani, og fóru ígjøgnum Galilēu;

og hann vildi ikki at nakar maður skuldi vita *tað*.

31 Tí hann lærdi sínar lærusveinar, og segði við teir, Menniskjusonurin verður givin upp í mannahendur, og teir skulu drepa hann; og eftir at hann er dripin, skal hann rísa hin triðja dagin.

32 Men teir skiltu ikki ta framsøgnina, og vóru ræddir at spyrja hann.

33 ¶ Og hann kom til Că-pĕr´-nă-ŭm: og, verandi inni í húsinum, spurdi hann teir, Hvat var tað sum tit umrøddu tykkara millum eftir veginum?

34 Men teir hildu friði sínum: tí eftir veginum høvdu teir umrøtt sín ámillum, hvør *skuldi verið* hin størsti.

35 Og hann settist niður, og kallaði teir tólv, og sigur við teir, Um nakar maður trái at vera fyrstur, *hin sami* skal vera síðstur av øllum, og tænari hjá øllum.

36 Og hann tók eitt barn, og setti hann í miðju teirra: og tá ið hann hevði tikið hann í armar sínar, segði hann við teir,

37 Hvørsumhelst *ið* skal taka ímóti ēinum av slíkum børnum í navni mínum, tekur ímóti mær: og hvørsumhelst *ið* skal taka ímóti mær, tekur ikki ímóti mær, men honum sum sendi meg.

38 ¶ Og Jóhannes svaraði honum, sigandi, Meistari, vit sóu ēin, kastandi út djevlar í navni tínum, og hann fylgir ikki okkum: og vit sýttu honum, av tí at hann fylgir ikki okkum.

39 Men Jesus segði, Sýtið honum ikki: tí at tað er eingin maður sum skal gera eitt kraftarverk í navni mínum, sum kann lættliga tala ilt um meg.

40 Tí at hann sum er ikki ímóti okkum, er í okkara parti.

41 Tí at hvørsumhelst *ið* skal geva tykkum eitt bikar av vatni at drekka í navni mínum, av tí at tit hoyra Christi til, sanniliga sigi eg tykkum, hann skal ikki missa endurgjald sítt.

42 Og hvørsumhelst *ið* skal *volda* ēinum av *hesum* smáu, sum trúgva á meg, meinboga, tað er betri fyri hann, at ein mylnusteinur varð hongdur um háls hansara, og hann varð kastaður inn í sjógvin.

43 Og um hond tín *voldi* tær meinboga, sker hana av: tað er betri hjá tær at ganga inn til lívs vanførur, enn, havandi tvær hendur, at fara inn í helviti, inn í eldin sum aldri skal verða sløktur:

44 Har ormur teirra doyr ikki, og eldurin verður ikki sløktur.

45 Og um fótur tín *voldi* tær meinboga, sker hann av: tað er betri hjá tær at ganga haltur inn til lívs, enn, havandi tveir føtur, at verða kastaður inn í helviti, inn í eldin sum aldri skal verða sløktur:

46 Har ormur teirra doyr ikki, og eldurin verður ikki sløktur.

47 Og um eyga títt *voldi* tær meinboga, slít tað út: tað er betri hjá tær at ganga inn í kongadømi Guðs við ēinum eyga, enn, havandi tvey eygu, at verða kastaður inn í hel-eld:

48 Har ormur teirra doyr ikki, og eldurin verður ikki sløktur.

49 Tí at hvør *og* ēin skal verða saltaður við eldi, og hvørt sláturoffur skal verða saltað við salti.

50 Salt *er* gott: men um saltið havi mist sín saltleika, við hvørjum vilja tit krydda tað? Havið salt í tykkum sjálvum, og havið frið hvør við annan.

KAPITUL 10

OG hann reistist haðani, og kemur inn í umráðini av Judæu við handaru síðuna av Jordan: og fólkið leitar at honum aftur; og, sum hann var vanur, lærdi hann tey aftur.

2 ¶ Og Pharisēararnir komu til hansara, og spurdu hann, Er tað lógligt hjá einum manni at koyra burtur konu *sína?* freistandi hann.
3 Og hann svaraði og segði við teir, Hvat beyð Móses tykkum?
4 Og teir søgdu, Móses loyvdi at skriva eina skilnaðarlýsing, og at koyra *hana* burtur.
5 Og Jesus svaraði og segði við teir, Fyri harðleikan av tykkara hjørtum skrivaði hann tykkum hesa forskrift.
6 Men frá byrjanini av skapanini gjørdi Guð tey kall og kallinnu.
7 Fyri hesa grund skal maður fara frá faðir sínum og móður, og krøkja *seg* til konu sína;
8 Og tey tvey skulu verða ēitt kjøt: so eru tey tá ikki meira tvey, men ēitt kjøt.
9 Hvat tessvegna Guð hevur saman komið, lat ikki mann koyra sundur.
10 Og inni í húsinum spurdu hansara lærusveinar hann aftur um tað sama *evnið*.
11 Og hann sigur við teir, Hvørsumhelst *ið* skal koyra burtur konu sína, og giftast við eini aðrari, fremur hordóm ímóti henni.
12 Og um ein kvinna skal koyra burtur ektamann sín, og verða gift við einum øðrum, hon fremur hordóm.
13 ¶ Og tey førdu ung børn til hansara, at hann skuldi nema við tey: og *hansara* lærusveinar hartaðu tey sum førdu *tey*.
14 Men tá ið Jesus sá *tað*, varð hann mikið misnøgdur, og segði við teir, Loyvið lítlu børnunum at koma til mín, og sýtið teimum ikki: tí at slíkra er kongadømi Guðs.
15 Sanniliga sigi eg tykkum, Hvørsumhelst *ið* skal ikki taka ímóti kongadømi Guðs eins og eitt lítið barn, hann skal ikki ganga harinn.
16 Og hann tók tey upp í sínar armar, legði *sínar* hendur uppá tey, og vælsignaði tey.
17 ¶ Og tá ið hann var farin út á vegin, kom ēin rennandi, og knelaði fyri honum, og spurdi hann, Góði Meistari, hvat skal eg gera, at eg kann arva ævigt lív?
18 Og Jesus segði við hann, Hví kallart tú meg góðan? *tað er* eingin góður uttan ēin, *tað er*, Guð.
19 Boðini kennirt tú, Frem ikki hordóm, Drep ikki, Stjal ikki, Ber ikki falskan vitnisburð, Svík ikki, Æra faðir tín og móður.
20 Og hann svaraði og segði við hann, Meistari, øllum hesum havi eg givið ans *eftir* frá mínum ungdómi.
21 Jesus tá, skoðandi hann, elskaði hann, og segði við hann, Ēitt ting vantart tær: far tín veg, sel hvatsumhelst tú hevurt, og gev til tey fátæku, og tú skalt hava dýrgrip í himni: og kom, tak upp krossin, og fylg mær.
22 Og hann varð dapur við ta framsøgnina, og fór syrgin burtur: tí at hann hevði miklar ognir.
23 ¶ Og Jesus hugdi runt umkring, og sigur við lærusveinar sínar, Hvør treyðugligani skulu teir, sum hava ríkidømir, ganga inn í kongadømi Guðs!
24 Og lærusveinarnir vórðu bilsnir at orðum hansara. Men Jesus tekur til orða aftur, og sigur við teir, Børn, hvør torført tað er hjá teimum, sum troysta á ríkidømir, at ganga inn í kongadømi Guðs!
25 Tað er lættari hjá einum kameli at fara ígjøgnum eitt nálareyga, enn hjá einum ríkum manni at ganga inn í kongadømi Guðs.
26 Og teir vórðu bilsnir út um mát, sigandi sín ámillum, Hvør tá kann verða frelstur?
27 Og Jesus, hyggjandi uppá teir, sigur, Við monnum *tað er* ógjørligt, men ikki við Guði: tí at við Guði øll ting eru gjørlig.
28 ¶ Tá byrjaði Pætur at siga við hann, Sí, vit hava eftirlatið alt, og hava fylgt tær.

29 Og Jesus svaraði og segði, Sanniliga sigi eg tykkum, Tað er eingin maður sum hevur eftirlatið hús, ella brøður, ella systrar, ella faðir, ella móður, ella konu, ella børn, ella jarðir, fyri mína skyld, og gleðiboðskaparins,

30 Uttan *at* hann skal móttaka hundraðfalt nú í hesi tíð, hús˘, og brøður, og systrar, og møður, og børn, og jarðir, við atsóknum; og í hinum komandi heimi ævigt lív.

31 Men mangir, *sum eru* fyrstir, skulu verða síðstir; og hinir síðstu fyrstir.

32 ¶ Og teir vóru á veginum, farandi niðan til Jerusalem; og Jesus fór undan teimum: og teir vóru ógvaðir; og, sum teir fylgdu, vórðu teir ræddir. Og hann tók aftur teir tólv, og fór undir at siga teimum hvørji ting skuldu henda hann,

33 *Sigandi,* Sí, vit fara niðan til Jerusalem; og Menniskjusonurin skal verða givin upp til teir fremstu prestarnar, og til hinar skriftlærdu; og teir skulu fordøma hann til deyða, og skulu geva hann yvir til Heidningarnar:

34 Og teir skulu háða hann, og skulu húðfletta hann, og skulu spýta uppá hann, og skulu drepa hann: og hin triðja dag skal hann rísa aftur.

35 ¶ Og Jákob og Jóhannes, synir Zĕb-ĕ-dēē´-ūs-ar, koma til hansara, sigandi, Meistari, vit vildu at tú skuldirt gjørt fyri okkum hvatsumhelst *ið* vit skulu tráa.

36 Og hann segði við teir, Hvat vildu tit at eg skuldi gjørt fyri tykkum?

37 Teir søgdu við hann, Veit okkum at vit mega sita, ēin tær til høgru handar, og hīn tær til vinstru handar, í tíni dýrd.

38 Men Jesus segði við teir, Tit vita ikki hvat tit umbiðja: kunnu tit drekka av tí bikarinum sum eg drekki av? og verða doyptir við tí dópinum sum eg eri doyptur við?

39 Og teir søgdu við hann, Vit kunnu. Og Jesus segði við teir, Tit skulu vist drekka av tí bikarinum sum eg drekki av; og við tí dópi, sum eg eri doyptur við, skulu tit verða doyptir:

40 Men at sita mær til høgru handar og mær til vinstru handar, er ikki mítt at geva; men *tað skal verða givið til teirra,* fyri hvørjar tað er fyribúgvið.

41 Og tá ið teir tíggju hoyrdu *tað,* byrjaðu teir at verða mikið misnøgdir við Jákob og Jóhannes.

42 Men Jesus kallaði teir *til sín,* og sigur við teir, Tit vita, at teir ið verða roknaðir at ráða yvir Heidningunum, útinna harradømi yvir teimum; og hinir miklu teirra útinna myndugleika uppá teir.

43 Men soleiðis skal tað ikki vera tykkara millum: men hvørsumhelst *ið* vil vera mikil tykkara millum, skal vera tænari tykkara:

44 Og hvørsumhelst av tykkum *ið* vil vera hin fremsti, skal vera tænari hjá øllum.

45 Tí at sjálvt Menniskjusonurin kom ikki at verða tæntur at, men at tæna, og at geva sítt lív — eitt loysigjald fyri mangar.

46 ¶ Og teir komu til Jericho: og sum hann fór út úr Jericho við sínum lærusveinum og einum stórum tali av fólki, sat blindi Bär-tī-mæ´-ūs, sonur Tī-mæ´-ūs-ar, við síðuna av alfaraveginum biddandi.

47 Og tá ið hann hoyrdi at tað var Jesus úr Nazareth, tók hann at rópa út, og siga, Jesus, *tú* Sonur Dávids, hav miskunn yvir meg.

48 Og mangir áløgdu honum at hann skuldi halda friði sínum: men hann rópaði tað mikið meira ein stóran deil, *Tú* Sonur Dávids, hav miskunn yvir meg.

49 Og Jesus stóð stillur, og beyð hann at verða kallaðan. Og teir kalla hin blinda mannin, sigandi

við hann, Ver við góða uggan, rís; hann kallar teg.

50 Og hann, kastandi frá *sær* klæði sítt, reis, og kom til Jesu.

51 Og Jesus tók til orða og segði við hann, Hvat vilt tú at eg skuldi gjørt tær? Hin blindi maðurin segði við hann, Harri, at eg mátti fingið sjón mína.

52 Og Jesus segði við hann, Far tín veg; trúgv tín hevur gjørt teg heilan. Og straks fekk hann sjón sína, og fylgdi Jesusi á veginum.

KAPITUL 11

OG tá ið teir komu nær til Jerusalem, at Bĕth-phā́-gê og Bethaniu, við Olivinfjallið, sendir hann fram tveir av sínum lærusveinum,

2 Og sigur við teir, Farið tykkara veg inn í bygdina yvir av tykkum: og so skjótt sum tit verði komnir inn í hana, skulu tit finna eitt asnarfyl bundið, hvará aldri maður sat; loysið tað, og komið við *tí*.

3 Og um nakar maður sigi við tykkum, Hví gera tit hetta? sigið tit, at Harrin hevur tørv á tí; og beinanveg vil hann senda tað higar.

4 Og teir fóru sín veg, og funnu asnarfylið bundið við dyrnar uttanfyri á einum staði har tveir vegir møttust; og teir loysa tað.

5 Og ávísir av teimum, sum stóðu har, søgdu við teir, Hvat gera tit, loysandi asnarfylið?

6 Og teir søgdu við teir enntá sum Jesus hevði áboðið: og teir lótu tey fara.

7 Og teir førdu asnarfylið til Jesu, og kastaðu síni klæðir á tað; og hann settist uppá tað.

8 Og mong spreiddu síni klæðir á vegin: og onnur skóru niður greinar av trøunum, og stroyddu *tær* á vegin.

9 Og tey sum fóru undan, og tey sum fylgdu, rópaðu, sigandi, Hō-sănˊ-nă; Vælsignaður *er* hann sum kemur í navni Harrans:

10 Vælsignað *veri* kongadømi faðirs okkara Dávids, sum kemur í navni Harrans: Hō-sănˊ-nă í tí hægsta.

11 Og Jesus fór inn í Jerusalem, og inn í templið: og tá ið hann hevði hugt runt umkring uppá øll ting, og nú kvøldartíðin var komin, fór hann út til Bethaniu við teimum tólv.

12 ¶ Og um morgunin, tá ið teir vóru komnir frá Bethaniu, var hann svangur:

13 Og, síggjandi eitt fikutræ langt burturifrá, havandi bløð, kom hann, um møguliga hann mátti funnið okkurt ting hará: og tá ið hann kom at tí, fann hann einkið uttan bløð; tí at fikutíðin var ikki *enn*.

14 Og Jesus tók til orða og segði við tað, Eingin maður eti ávøkst av tær hereftir um ævir. Og hansara lærusveinar hoyrdu *tað*.

15 ¶ Og teir koma til Jerusalem: og Jesus fór inn í templið, og fór undir at kasta út teir sum seldu og keyptu í templinum, og velti um koll borðini hjá peningavekslarunum, og sessirnar hjá teimum ið seldu dúgvur;

16 Og vildi ikki loyva at nakar maður skuldi bera *nakað* ílat ígjøgnum templið.

17 Og hann frálærdi, sigandi við teir, Stendur ikki skrivað, Mítt hús skal verða kallað av øllum tjóðum bønarhúsið? men tit hava gjørt tað *til* eitt ránsmannaból.

18 Og hinir skriftlærdu og fremstu prestarnir hoyrdu *tað*, og søktu hvussu teir máttu oyða hann: tí at teir óttaðust hann, av tí at alt fólkið var ovfarið yvir hansara Guðslæru.

19 Og tá ið kvøld var komið, fór hann út úr staðinum.

20 ¶ Og um morgunin, sum teir fóru framvið, sóu teir fikutræið tornað upp frá rótunum.

21 Og Pæturi komandi *tað* í huga sigur við hann, Meistari, sí, fikutræið, sum tú bannaðirt, er følnað burtur.

22 Og svarandi sigur Jesus við teir, Havið trúgv á Guð.

23 Tí at sanniliga sigi eg tykkum, At hvørsumhelst *ið* skal siga við hetta fjallið, Veri tú burtflutt, og veri tú kastað inn í sjógvin; og skal ikki ivast í sínum hjarta, men skal trúgva, at tey tingini, sum hann sigur, skulu bera á; hann skal hava hvatsumhelst *ið* hann sigur.

24 Tí sigi eg tykkum, Hvørji ting sumhelst *ið* tit tráa tá ið tit biðja, trúgvið at tit móttaka *tey,* og tit skulu hava *tey*.

25 Og tá ið tit standa biðjandi, fyrigevið, um tit havi okkurt ímóti nøkrum: at tykkara Faðir eisini, sum er í himni, má fyrigeva tykkum tykkara misgerðir.

26 Men um tit fyrigevi ikki, eiheldur vil tykkara Faðir, sum er í himni, fyrigeva misgerðir tykkara.

27 ¶ Og teir koma aftur til Jerusalem: og, sum hann gekk í templinum, koma til hansara teir fremstu prestarnir, og hinir skriftlærdu, og hinir elstu,

28 Og siga við hann, Viðˆ hvørjum myndugleika gert tú hesi tingini? og hvør gav tær henda myndugleika at gera hesi tingini?

29 Og Jesus svaraði og segði við teir, Eg vil eisini spyrja tykkum ēin spurning, og svarið mær, og eg vil siga tykkum viðˆ hvørjum myndugleika eg geri hesi tingini.

30 Dópur Jóhannesar, var *hann* frá himni, ella av monnum? svarið mær.

31 Og teir tingaðust við sær sjálvum, sigandi, Um vit skulu siga, Frá himni; vil hann siga, Hví trúðu tit honum tá ikki?

32 Men um vit skulu siga, Av monnum; teir óttaðust fólkið: tí at allir *menn* roknaðu Jóhannes, at hann var ein prophetur í roynd *og veru*.

33 Og teir svaraðu og søgdu við Jesus, Vit kunnu ikki siga. Og svarandi sigur Jesus við teir, Eiheldur sigi eg tykkum viðˆ hvørjum myndugleika eg geri hesi tingini.

KAPITUL 12

OG hann fór undir at tala til teirra viðˆ dømisøgum. Ein *ávísur* maður plantaði ein víngarð, og setti eina girðing um *hann,* og gróv *eitt plass til* vínfitina, og bygdi eitt torn, og leigaði hann út til bøndur, og fór inn í eitt fjarlagið land.

2 Og við árstíðina sendi hann til bøndurnar ein tænara, at hann mátti fáa frá bøndunum av fruktini av víngarðinum.

3 Og teir gripu *hann,* og bardu hann, og sendu *hann* avstað tómhentan.

4 Og aftur sendi hann til teirra ein annan tænara; og eftir honum kastaðu teir steinar, og særdu *hann* í høvdið, og sendu *hann* avstað skammiliga handfarnan.

5 Og aftur sendi hann ein annan; og hann drópu teir, og mangar aðrar; berjandi summar og drepandi summar.

6 Havandi enn tessvegna ēin son, sín vælelskaða, sendi hann hann eisini síðst til teirra, sigandi, Teir vilja hava virðing fyri syni mínum.

7 Men hasir bøndurnir søgdu sín ámillum, Hesin er arvingin; komið, latum okkum drepa hann, og arvurin skal verða okkara.

8 Og teir tóku hann, og drópu *hann,* og kastaðu *hann* út úr víngarðinum.

9 Hvat skal tí harrin av víngarðinum gera? hann vil koma og oyða bøndurnar, og vil geva víngarðin at øðrum.

10 Og hava tit ikki lisið hetta

skrift*staðið*; Steinurin, sum smiðirnir vrakaðu, er vorðin høvuðs horn*steinurin:*

11 Hetta var gerningur Harrans, og tað er undrunarvert í eygum várum?

12 Og teir søktu at leggja hald á hann, men óttaðust fólkið: tí at teir vitstu, at hann hevði talað dømisøguna ímóti teimum: og teir fóru frá honum, og fóru sín veg.

13 ¶ Og teir senda til hansara ávísar av Pharisēarunum og av Hĕ-ró´-dĭ-ăr-unum, at fanga hann í orðum *hansara*.

14 Og tá ið teir vóru komnir, siga teir við hann, Meistari, vit vita at tú ert sannur, og leggurt ikki í nakran mann: tí at tú gevurt tær ikki far um persónar manna, men lærirt veg Guðs í sannleika: Er tað lógligt at geva íkast til Çæsars, ella ikki?

15 Skulu vit geva, ella skulu vit ikki geva? Men hann, kennandi teirra hykl, segði við teir, Hví freista tit meg? fáið mær ein denar, at eg má sjá *hann*.

16 Og teir fingu *hann*. Og hann sigur við teir, Hvørs mynd og yvirskrift *er* henda? Og teir søgdu við hann, Çæsars.

17 Og svarandi segði Jesus við teir, Greiðið til Çæsars lutirnar sum eru Çæsars, og til Guðs lutirnar sum eru Guðs. Og teir undraðust á hann.

18 ¶ Tá koma til hansara Săddû-cēē´-ararnir, sum siga *at* eingin uppreisn er til; og teir spurdu hann, sigandi,

19 Meistari, Móses skrivaði okkum, Um bróðir mans doyggi, og eftirlati *sína* konu *eftir seg*, og eftirlati eingi børn, at bróðir hansara skuldi taka konu hansara, og reisa upp bróður sínum sáð.

20 Nú, tað vóru sjey brøður: og hin fyrsti tók sær eina konu, og, doyggjandi eftirlæt einkið sáð.

21 Og hin annar tók hana, og doyði, eiheldur eftirlæt hann nakað sáð: og hin triðji líkaleiðis.

22 Og teir sjey høvdu hana, og eftirlótu einkið sáð: síðst av øllum doyði kvinnan eisini.

23 Í uppreisnini tessvegna, tá ið tey skulu rísa, hvørs kona skal hon verða av teimum? tí at teir sjey høvdu hana til konu.

24 Og svarandi segði Jesus við teir, Fara tit ikki tessvegna skeivir, av tí at tit kenna ikki skriftirnar, eiheldur Guðs mátt?

25 Tí at tá ið tey rísa frá hinum deyðu, hvørki giftast tey, ella verða givin í giftu; men eru eins og einglarnir sum eru í himni.

26 Og hvat teimum deyðu viðvíkur, at tey rísa: hava tit ikki lisið í Mósebókini, hvussu í runninum Guð talaði til hansara, sigandi, Eg *eri* Guð Ábrahams, og Guð Ísaaks, og Guð Jákobs?

27 Hann er ikki Guð teirra deyðu, men Guð teirra livandi: tit tessvegna fara stórliga skeivir.

28 ¶ Og ēin av teimum skriftlærdu kom, og, havandi hoyrt teir skiftandi orð saman, og varnandi at hann hevði svarað teimum væl, spurdi hann, Hvørt er tað fyrsta boðið av øllum?

29 Og Jesus svaraði honum, Tað fyrsta av øllum boðunum *er,* Hoyr, O Ísrael; Harrin Guð vár er ēin Harri:

30 Og, tú skalt elska Harran Guð tín við øllum hjarta tínum, og við allari sál tíni, og við øllum huga tínum, og við allari styrki tíni: hetta *er* tað fyrsta boðið.

31 Og hitt annað *er* líkt, *nevniliga* hetta, Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg. Tað er einkið annað boð størri enn hesi.

32 Og hin skriftlærdi segði við hann, Gott, Meistari, tú hevurt sagt sannleikan: tí at tað er ēin Guð; og tað er eingin annar uttan hann:

33 Og at elska hann við øllum hjartanum, og við øllum skilinum, og við allari sálini, og við allari styrkini, og at elska næsta *sín* sum sjálvan seg, er meiri enn øll heil brennioffurˇ og sláturoffurˇ.

34 Og tá ið Jesus sá, at hann svaraði hyggjuliga, segði hann við hann, Tú ert ikki langt frá kongadømi Guðs. Og eingin maður eftir tað tordi spyrja hann *nakran spurning*.

35 ¶ Og Jesus tók til orða og segði, meðan hann frálærdi í templinum, Hvussu siga hinir skriftlærdu, at Christus er Sonur Dávids?

36 Tí at Dávid sjálvur segði viðˆ Halga Andanum, HARRIN segði til Harra mín, Setst tú við høgru hond mína, til eg geri tínar fíggindar *til* fótskammul tín.

37 Dávid tí sjálvur kallar hann Harra; og hvaðani er hann *tá* sonur hansara? Og tað meiniga fólkið hoyrdi hann fegið.

38 ¶ Og hann segði við tey í síni Guðslæru, Verið varin fyri hinum skriftlærdu, sum elska at ganga í longum klæðum, og *elska* heilsanir á torgunum,

39 Og teir fremstu sessirnar í sýnagogunum, og tey ovastu sætini í veitslum:

40 Sum oyðeta húsini hjá einkjum, og á kvamsvís halda langar bønir: hesir skulu fáa størri heldøming.

41 ¶ Og Jesus sat yvir av skattkamarinum, og skoðaði hvussu fólkið kastaði pening inn í skattkamarið: og mong, sum vóru rík, kastaðu inn mikið.

42 Og har kom ein ávís fátæk einkja, og hon blakaði inn tveir smápeningar, sum geva eitt oyra.

43 Og hann kallaði *til sín* sínar lærusveinar, og sigur við teir, Sanniliga sigi eg tykkum, At henda fátæka einkja hevur kastað meira inn enn øll tey sum hava kastað inn í skattkamarið:

44 Tí at øll *tey* kastaðu inn av síni yvirflóð; men hon av sínum troti kastaði inn alt tað hon hevði, *enntá* alt sítt livibreyð.

KAPITUL 13

OG sum hann fór út úr templinum, sigur ein av hansara lærusveinum við hann, Meistari, síggj hvørsháttar steinar og hvørjir bygningar *her eru!*

2 Og svarandi segði Jesus við hann, Sært tú hesar miklu bygningar? tað skal ikki verða eftirlatin ein steinur uppiá øðrum, sum skal ikki verða rivin niður.

3 Og sum hann sat uppiá Olivinfjallinum yvir av templinum, spurdu Pætur og Jákob og Jóhannes og Andreas hann einsærisliga,

4 Sig okkum, nær skulu hesi tingini verða? og hvat *skal vera* tekinið, tá ið øll hesi ting skulu verða uppfylt?

5 Og svarandi teimum byrjaði Jesus at siga, Ansið eftir, at ikki nakar *maður* villleiði tykkum:

6 Tí at mangir skulu koma í navni mínum, sigandi, Eg eri *Christus;* og skulu villleiða mong.

7 Og tá ið tit skulu hoyra um orrustur og leysatíðindir um orrustur, verðið tit ikki órógvaðir: tí at *slík ting* mugu neyðugt verða; men endin *skal* ei *verða* enn.

8 Tí at tjóð skal rísa ímóti tjóð, og kongadømi ímóti kongadømi: og tað skulu verða jarðskjálvtar á ymsum støðum, og tað skulu verða hungursneyðir og ófriðir: hesi *eru* byrjanirnar til *føðingar*sorgir.

9 ¶ Men ansið eftir tykkum sjálvum: tí at teir skulu geva tykkum upp til ráðˇ; og í sýnagogunum skulu tit verða bardir: og tit skulu verða førdir framfyri stjórnarar og kongar fyri mína skyld, til ein vitnisburð ímóti teimum.

10 Og gleðiboðskapurin má fyrst verða kunngjørdur millum allar tjóðir.

11 Men tá ið tey skulu leiða *tykkum,* og geva tykkum upp, stúrið ikki frammanundan fyri hvat tit skulu tala, eiheldur hugsi tit um tað fyrifram: men hvatsumhelst *ið* skal verða givið tykkum í tí tíma, tað talið tit: tí at tað eru ikki tit sum tala, men Halgi Andin.

12 Nú, bróðirin skal svíkja bróðurin til deyða, og faðirin sonin; og børn skulu rísa upp ímóti foreldrum *sínum,* og skulu volda tey at verða tikin av lívi.

13 Og tit skulu verða hataðir av øllum *monnum* fyri navns míns skuld: men hann sum skal halda út *fram*at endanum, hin sami skal verða frelstur.

14 ¶ Men tá ið tit skulu síggja andstygd oyðingarinnar, talað um av Dániel propheti, standandi har hon ikki átti, (lat hann, sum lesur, skilja,) tá lat tey, sum verði í Judæu, flýggja til fjallanna:

15 Og lat hann, sum er á húsatekjuni, ikki fara niður inn í húsið, eiheldur fara *harinn,* at taka nakað ting út úr húsi sínum:

16 Og lat hann, sum er á markini, ikki venda tilbakar aftur fyri at taka upp klæði sítt.

17 Men vei til teirra sum eru við barn, og til teirra sum geva at súgva í teimum døgum!

18 Og biðjið tit, at tykkara flýggjan verði ikki um veturin.

19 Tí at *í* teimum døgum skal vera nívd, slík sum var ikki frá byrjanini av skapanini sum Guð skapti, at hesi tíð, eiheldur skal verða.

20 Og uttan at Harrin hevði stytt teir dagarnar, hevði einkið hold verðið frelst: men fyri hini útvøldu skyld, sum hann hevur útvalt, hevur hann stytt dagarnar.

21 Og tá, um nakar maður skal siga til tykkara, Sí, her *er* Christus; ella, sí, *hann er* har; trúgvið *honum* ikki:

22 Tí at falskir Christar og falskir prophetar skulu stíga *upp,* og skulu sýna tekin˘ og undur˘, *fyri* at tøla, um *tað var* møguligt, sjálvt hini útvøldu.

23 Men ansið tit eftir: sí, eg havi frammanundan sagt tykkum allar lutir.

24 ¶ Men í teimum døgum, eftir hasa trongsluna, skal sólin verða myrkjað, og mánin skal ei geva ljós sítt;

25 Og stjørnur himins skulu falla; og krefturnar, sum eru í himni, skulu verða skakaðar.

26 Og tá skulu tey síggja Menniskjusonin komandi í skýggjunum við miklum mátti og dýrd.

27 Og tá skal hann senda sínar einglar, og skal savna saman síni útvøldu frá hinum fýra vindum, frá hinum ytsta parti jarðarinnar til hin ytsta part av himni.

28 Nú, lærið eitt líknilsi av fikutræinum; Tá ið hennara grein er enn viðbrekin, og skjýtur fram bløð, vita tit at summar er nær:

29 Soleiðis tit á líkan hátt, tá ið tit skulu síggja hesi ting bera á, vitið at tað er nær, *enntá* við dyrnar˘.

30 Sanniliga sigi eg tykkum, at henda ætt skal ikki ganga undir, fyrrenn øll hesi ting verði gjørd.

31 Himin og jørð skulu ganga undir: men orðini hjá mær skulu ikki ganga undir.

32 ¶ Men um tann dag og *tann* tíma veit eingin maður, nei, ikki einglarnir sum eru í himni, eiheldur Sonurin, bert Faðirin.

33 Ansið tit eftir, vakið og biðjið: tí at tit vita ikki nær tíðin er.

34 *Tí at Menniskjusonurin er* eins og ein maður, farandi eina langa ferð, sum fór frá húsi sínum, og gav myndugleika til tænara sína, og hvørjum manni sítt verk, og beyð duravørðinum at vaka.

35 Vakið tit tessvegna: tí at tit vita ikki nær meistarin av hús-

inum kemur, um aftan, ella um midnátt, ella um hanagal, ella um morgunin:
36 At ikki, komandi dáttligani, hann finni tykkum sovandi.
37 Og tað *sum* eg sigi við tykkum, *tað* sigi eg við allar, Vakið.

KAPITUL 14

EFTIR tveir dagar var *hátíð* umleypsins, og ósúrgaðs breyðs: og teir fremstu prestarnir og hinir skriftlærdu søktu hvussu teir máttu tikið hann við listum, og tikið *hann* av lívi.
2 Men teir søgdu, Ikki á hátíðar-*deginum,* at ikki tað verði eitt uppstig av fólkinum.
3 ¶ Og, verandi í Bethaniu, í húsinum hjá Símun tí spitalska, sum hann sat til matar, kom ein kvinna, havandi eina alabasturkrukku av nardus-salvu, sera dýrabærari; og hon breyt krukkuna, og helti *hana* á høvur hansara.
4 Og har vóru summir sum høvdu harmavreiði innan í sær sjálvum, og søgdu, Hví varð henda burturspilling av salvuni gjørd?
5 Tí at hon mátti havt verðið seld fyri meira enn trý hundrað denarar, og havt verðið givið til hini fátæku. Og teir knarraðu inná hana.
6 Og Jesus segði, Latið hana vera; hví órógva tit hana? hon hevur virkað eitt gott verk á meg.
7 Tí at tit hava hini fátæku hjá tykkum altíð; og nærsumhelst tit vilja mega tit gera teimum gott: men meg hava tit ikki altíð.
8 Hon hevur gjørt tað hon kundi: hon er komin frammanundan at salva mítt likam til jarðanina.
9 Sanniliga sigi eg tykkum, Hvarsumhelst *ið* hesin gleðiboðskapur skal verða prædikaður út um allan heimin, *hetta* eisini, sum hon hevur gjørt, skal verða talað um til eitt minni um hana.
10 ¶ Og Judas Iscariot, ēin av teimum tólv, fór til teir fremstu prestarnar, at svíkja hann til teirra.
11 Og tá ið teir hoyrdu *tað,* vórðu teir glaðir, og lovaðu at geva honum pening. Og hann søkti hvussu hann mátti lagaliga svíkja hann.
12 ¶ Og hin fyrsta dagin av ósúrgaðum breyði, tá ið teir drópu umleypið, søgdu hansara lærusveinar við hann, Hvar vilt tú at vit fara og fyribúgva, at tú mást eta umleypið?
13 Og hann sendir fram tveir av sínum lærusveinum, og sigur við teir, Farið tit inn í staðin, og har skal møta tykkum ein maður, berandi eina krukku av vatni: fylgið honum.
14 Og hvarsumhelst *ið* hann skal fara inn, sigið við húsfaðirin av húsinum, Meistarin sigur, Hvar er gestakamarið, har eg skal eta umleypið við lærusveinum mínum?
15 Og hann vil sýna tykkum eitt stórt ovara rúm, borðreitt *og* fyribúgvið: har gerið tilreiðar til okkara.
16 Og hansara lærusveinar fóru fram, og komu inn í staðin, og funnu eins og hann hevði sagt við teir: og teir gjørdu tilreiðar umleypið.
17 Og um kvøldið kemur hann við teimum tólv.
18 Og sum teir sótu og ótu, segði Jesus, Sanniliga sigi eg tykkum, Ēin av tykkum, sum etur við mær, skal svíkja meg.
19 Og teir byrjaðu at verða syrgnir, og at siga við hann ēin eftir ēin, *Er* tað eg? og ein annar *segði, Er* tað eg?
20 Og hann svaraði og segði við teir, *Tað er* ēin av teimum tólv, sum dyppar við mær í fatið.
21 Menniskjusonurin víst fer, eins og skrivað stendur um hann: men vei tí manni, viðˆ hvørjum Menniskjusonurin verður svikin!

gott var tað hjá tí manni, um hann hevði aldri verið føddur.

22 ¶ Og sum teir ótu, tók Jesus breyð, og vælsignaði, og breyt *tað,* og gav til teirra, og segði, Takið, etið: hetta er likam mítt.

23 Og hann tók bikarið, og tá ið hann hevði veitt tøkkir, gav hann *tað* til teirra: og teir drukku allir av tí.

24 Og hann segði við teir, Hetta er blóð mítt hins nýggja testamentis, sum verður úthelt fyri mangar.

25 Sanniliga sigi eg tykkum, Eg vil ei meira drekka av ávøksti víntræsins, inntil tann dag sum eg drekki hann nýggjan í kongadømi Guðs.

26 ¶ Og tá ið teir høvdu sungið ein lov-psálm, fóru teir út á Olivinfjallið.

27 Og Jesus sigur við teir, Allir tit skulu fáa meinboga vegna mín hesa nátt: tí at skrivað stendur, Eg vil sláa hirðan, og seyðirnir skulu verða spjaddir.

28 Men eftir at eg eri risin, vil eg fara undan tykkum inn í Galilēu.

29 Men Pætur segði við hann, Tó *at* allir skulu fáa meinboga, tó *vil* ikki eg.

30 Og Jesus sigur við hann, Sanniliga sigi eg tær, At henda dag, *enntá* í hesi nátt, áður enn hanin gelur tværreisur, skalt tú avnokta meg trærreisur.

31 Men hann talaði tess meiri ógvusligani, Um eg skuldi doyð við tær, vil eg ikki avnokta teg á nakran vís. Somuleiðis eisini søgdu teir allir.

32 Og teir komu til eitt stað, sum varð nevnt Gēth-sĕ´-mâ-nē: og hann sigur til lærusveina sína, Setist tit her, meðan eg skal biðja.

33 Og hann tekur við sær Pætur og Jákob og Jóhannes, og tók at verða sára ógvaður, og at verða sera tungur;

34 Og sigur við teir, Mín sál er avbera sorgarfull at deyða: dvøljið tit her, og vakið.

35 Og hann fór frameftir eitt sindur, og fell á jørðina, og bað, at um tað var gjørligt, *tann* tímin mátti farið framvið frá honum.

36 Og hann segði, Abba, Faðir, øll ting *eru* gjørlig hjá tær; tak burtur hesa skál frá mær: hóast hetta, ikki hvat eg vil, men hvat tú vilt.

37 Og hann kemur, og finnur teir sovandi, og sigur við Pætur, Símun, svevurt tú? kundirt tú ikki vaka ēin tíma?

38 Vakið tit og biðjið, at ikki tit innfari inn í freisting. Sanniliga, andin *er* fúsur, men kjøtið *er* veikt.

39 Og aftur fór hann avstað, og bað, og talaði tey somu orðini.

40 Og tá ið hann kom aftur, fann hann teir sovandi aftur, (tí at eygu teirra vóru tung,) eiheldur vitstu teir hvat svara honum *átti.*

41 Og hann kemur triðju ferðina, og sigur við teir, Sovið nú víðari, og takið hvíld *tykkara:* tað er nóg mikið, tímin er komin; sí, Menniskjusonurin verður svikin inn í hendurnar á syndarum.

42 Reisist upp, latum okkum fara; sí, hann, ið svíkur meg, er fyri hond.

43 ¶ Og alt fyri eitt, meðan hann enn talaði, kemur Judas, ēin av teimum tólv, og við honum ein mikil fjøld við svørðum og stavum, frá fremstu prestunum og hinum skriftlærdu og hinum elstu.

44 Og hann, ið sveik hann, hevði givið teimum eitt tekin, sigandi, Hvønnsumhelst *ið* eg skal kyssa, hin sami er hann; takið hann, og leiðið *hann* avstað tryggliga.

45 Og so skjótt sum hann var komin, fer hann beinanvegin til hansara, og sigur, Meistari, meistari; og kysti hann.

46 ¶ Og teir løgdu sínar hendur á hann, og tóku hann.

47 Og ēin av teimum sum

stóðu hjá, dró eitt svørð, og sló ein tænara hjá høvuðsprestinum, og skar av oyra hansara.

48 Og Jesus tók til orða og segði við teir, Eru tit komnir út sum ímóti einum tjóvi, við svørðum og *við* stavum at taka meg?

49 Eg var dagligani hjá tykkum í templinum og frálærdi, og tit tóku meg ikki: men skriftirnar mugu verða uppfyltar.

50 Og teir allir yvirgóvu hann, og flýddu.

51 Og har fylgdi honum ein ávísur ungur maður, havandi eitt línklæði sveipað um *sítt* nakna *likam;* og teir ungu menninir løgdu hald á hann:

52 Og hann eftirlæt línklæðið, og flýddi frá teimum nakin.

53 ¶ Og teir leiddu Jesus avstað til høvuðsprestin: og hjá honum vóru savnaðir allir hinir fremstu prestarnir og hinir elstu og hinir skriftlærdu.

54 Og Pætur fylgdi honum langt burturifrá, enntá inn í borgina hjá høvuðsprestinum: og hann sat hjá tænarunum, og vermdi seg við eldin.

55 Og teir fremstu prestarnir og alt ráðið søktu eftir vitnisburði ímóti Jesusi, at taka hann av lívi; og funnu einkið.

56 Tí at mangir bóru falskan vitnisburð ímóti honum, men teirra vitnisburður kom ikki ásamt.

57 Og tað reistu *seg* ávísir, og bóru falskan vitnisburð ímóti honum, sigandi,

58 Vit hoyrdu hann siga, Eg vil oyðileggja hetta tempul, sum er gjørt við hondum, og innanfyri tríggjar dagar vil eg byggja eitt annað, gjørt uttan hendur.

59 Men eiheldur soleiðis kom teirra vitnisburður ásamt.

60 Og høvuðspresturin stóð upp í miðjuni, og spurdi Jesus, sigandi, Svarart tú einkið? hvat *er tað sum* hesir vitna ímóti tær?

61 Men hann helt friði sínum, og svaraði einkið. Aftur spurdi høvuðspresturin hann, og segði við hann, Ert tú Christus˜, Sonur hins Vælsignaða?

62 Og Jesus segði, Eg eri: og tit skulu síggja Menniskjusonin sitandi við høgru hond kraftar, og komandi í skýggjum himins.

63 Tá skræddi høvuðspresturin klæðir síni, og sigur, Hvat tarvast okkum nøkur vitnir longur?

64 Tit hava hoyrt Guðsspottanina: hvat halda tit? Og teir allir fordømdu hann at vera sekan til deyða.

65 Og summir tóku at spýta á hann, og at hylja andlit hansara, og at berja hann, og at siga við hann, Prophetera: og tænararnir slógu hann við lógvum sínum.

66 ¶ Og, sum Pætur var niðriundir í borgini, kemur ēin av ternunum hjá høvuðsprestinum:

67 Og tá ið hon sá Pætur vermandi seg sjálvan, hugdi hon uppá hann, og segði, Og eisini tú vart við Jesusi úr Nazareth.

68 Men hann noktaði, sigandi, Eg veit ikki, eiheldur skilji eg hvat tú sigurt. Og hann fór út í forhøllina; og hanin gól.

69 Og ein terna sá hann aftur, og tók at siga við tey sum stóðu hjá, Hetta er *ēin* av teimum.

70 Og hann noktaði tað aftur. Og eitt sindur aftaná søgdu tey, sum stóðu hjá, aftur við Pætur, Vissuliga ert tú *ēin* av teimum: tí at tú ert ein Galilæari, og tín tala samsvarar *við tað*.

71 Men hann tók at banna og at svørja, *sigandi,* Eg kenni ikki henda mann, um hvønn tit tala.

72 Og *fyri* aðru ferðina gól hanin. Og Pæturi kom í huga orðið sum Jesus segði við hann, Áður enn hanin gelur tværreisur, skalt tú avnokta meg trærreisur. Og tá ið hann hugsaði um tað, græt hann.

KAPITUL 15

OG beinanvegin um morgunin hildu fremstu prestarnir ráðagerð við hinum elstu og skriftlærdu og øllum ráðinum, og bundu Jesus, og bóru *hann* avstað, og góvu *hann* yvir til Pilatusar.

2 Og Pilatus spurdi hann, Ert tú Kongur Jødanna? Og svarandi segði hann við hann, Tú sigurt *tað.*

3 Og teir fremstu prestarnir ákærdu hann fyri mangar lutir: men hann svaraði einkið.

4 Og Pilatus spurdi hann aftur, sigandi, Svarart tú einkið? sí hvussu mong ting teir vitna ímóti tær.

5 Men Jesus svaraði enn einkið; so at Pilatus undraðist.

6 Nú, á *teirri* hátíðini læt hann teimum leysan ēin fanga, hvønnsumhelst teir tráaðu.

7 Og har var *ēin,* nevndur Bâr´āb-bās, *sum lá* bundin *saman* við teimum sum høvdu gjørt uppreist við honum, hvørjir framt høvdu morð í uppreistrinum.

8 Og mannfjøldin, rópandi hart, tók at tráa *hann at gera* sum hann altíð hevði gjørt teimum.

9 Men Pilatus svaraði teimum, sigandi, Vilja tit at eg lati tykkum leysan Kong Jødanna?

10 Tí at hann vitsti, at teir fremstu prestarnir høvdu givið hann yvir vegna øvund.

11 Men teir fremstu prestarnir rørdu fólkið, at hann skuldi heldur lata teimum Bâr´āb-bās leysan.

12 Og Pilatus svaraði og segði aftur við tey, Hvat vilja tit tá, at eg skal gera *at honum,* sum tit kalla Kong Jødanna?

13 Og tey geylaðu út aftur, Krossfest hann.

14 Tá segði Pilatus við tey, Hví, hvat ilt hevur hann gjørt? Og tey geylaðu út tess meiri ovurhondsligani, Krossfest hann.

15 ¶ Og *so* Pilatus, viljugur at gera fólkið nøgt, læt teimum Bâr´āb-bās leysan, og gav Jesus yvir, tá ið hann hevði húðflett *hann,* til at verða krossfestan.

16 Og hermenninir leiddu hann avstað inn í høllina, kallað Præ-tōr´ī-ūm; og teir kalla saman alt liðið.

17 Og teir klæddu hann við purpuri, og flættaðu eina krúnu av tornum, og settu hana um *høvur* hansara,

18 Og tóku at heilsa honum, Heilur *og sælur,* Jøda Kongur!

19 Og teir slógu hann í høvdið við einum rørstavi, og spýttu uppá hann; og, boyggjandi *síni* knø, tilbóðu hann.

20 Og tá ið teir høvdu háðað hann, tóku teir av purpurið frá honum, og lótu hann í hans egnu klæðir, og leiddu hann út at krossfesta hann.

21 Og teir noyða ēin Símun, ein Cý-rē´-nē-ing, sum kom framvið, komandi uttan av markini, faðir *teirra* Alexanders og Rufusar, at bera kross hansara.

22 Og teir føra hann at plássinum Gōl´-gă-thă, sum er, verðandi týtt, Plássið av einum skølti.

23 Og teir góvu honum at drekka vín blandað við myrrhu: men hann tók ikki við *tí.*

24 Og tá ið teir høvdu krossfest hann, skiftu teir hansara klæðir, kastandi lutir uppá tey, hvat hvør maður skuldi taka.

25 Og tað var hin triðji tímin, og teir krossfestu hann.

26 Og yvirskriftin av hansara skuldseting stóð skrivað *uppi* yvir, KONGUR JØDANNA.

27 Og við honum krossfesta teir tveir ránsmenn; tann ēina við hans høgru hond, og hīn við hansara vinstru.

28 Og skriftin varð uppfylt, sum sigur, Og hann varð taldur við misgerðarmonnunum.

29 Og tey, sum fóru framvið, rivu *niður* á hann, vaggandi *við* høvdum sínum, og sigandi, Há,

tú sum oyðirt templið, og byggirt *tað* á trimum døgum,
30 Frels teg sjálvan, og kom niður frá krossinum.
31 Somuleiðis eisini teir fremstu prestarnir háðandi søgdu sín ámillum við teimum skriftlærdu, Hann frelsti onnur; seg sjálvan kann hann ikki frelsa.
32 Lat Christ, Kong Ísraels, stiga niður nú frá krossinum, at vit mega síggja og trúgva. Og teir, sum vóru krossfestir við honum, spottaðu hann út.
33 Og tá ið hin sætti tímin var komin, varð tað myrkur yvir øllum landinum inntil hin níggjunda tíman.
34 Og við hin níggjunda tíman rópti Jesus við harðari rødd, sigandi, Ē´-lō-ī, Ē´-lō-ī, lā´-mā sâ-băch-thā´-nī? hvørt er, verðandi týtt, Guð mín, Guð mín, hví hevurt tú yvirgivið meg?
35 Og summir av teimum sum stóðu hjá, tá ið teir hoyrdu *tað*, søgdu, Sí, hann kallar Ē-lī´-ăs.
36 Og ēin rann og fylti ein svamp fullan av ediki, og setti *hann* á ein rørstav, og gav honum at drekka, sigandi, Lat vera; lat okkum sjá hvørt Ē-lī´-ăs vil koma at taka hann niður.
37 Og Jesus rópti við harðari rødd, og gav upp andan.
38 Og forhangið av templinum varð skrætt í tvent frá ovast til niðast.
39 ¶ Og tá ið hundraðsovastin, sum stóð yvir av honum, sá, at hann soleiðis rópaði út, og gav upp andan, segði hann, Sanniliga, hesin maðurin var Sonur Guðs.
40 Har vóru eisini kvinnur, hyggjandi at langt burturifrá: hvørja millum var Maria Măg-dă-lē´-nă; og Maria, móðir Jákobs hins minna og Jó´-sĕs-ar; og Sâ-lō´-mê;
41 (Hvørjar eisini, tá ið hann var í Galilēu, fylgdu honum, og tæntu honum;) og mangar aðrar kvinnur, sum komu niðan við honum til Jerusalem.
42 ¶ Og nú tá ið kvøldið var komið, av tí at tað var tilreiðingin, tað er, dagurin fyri sabbatin,
43 Jóseph úr Ar-ĭ-mă-thæ´-ŭ, ein ærusamur ráðharri, hvør eisini væntaði eftir kongadømi Guðs, kom, og fór inn djarvligani til Pilatusar, og bønaði *um* likamið av Jesusi.
44 Og Pilatus undraðist um hann var longu deyður: og, kallandi *at sær* hundraðsovastan, spurdi hann hann, hvørt hann hevði verið nakra stund deyður.
45 Og tá ið hann vitsti *tað* frá hundraðsovastanum, gav hann likamið til Josephs.
46 Og hann keypti fínt línklæði, og tók hann niður, og sveipaði hann í línklæðið, og legði hann í eitt gravhýsi sum var høgt út úr einum kletti, og rullaði ein stein at dyrnum á gravhýsinum.
47 Og Maria Măg-dă-lē´-nă og Maria, *móðir* Jó´-sĕs-ar, eygleiddu hvar hann varð lagdur.

KAPITUL 16

OG tá ið sabbaturin var umliðin høvdu Maria Măg-dă-lē´-nă, og Maria — *móðir* Jákobs, og Sâ-lō´-mê, keypt sætar kryddurtir, at tær máttu koma og salva hann.
2 Og reiðuliga árla um morgunin, hin fyrsta *dagin* av vikuni, komu tær at gravhýsinum við sólarris.
3 Og tær søgdu sín ámillum, Hvør skal rulla okkum burtur steinin frá munnanum á gravhýsinum?
4 Og tá ið tær hugdu, sóu tær at steinurin var rullaður burtur: tí at hann var sera mikil.
5 Og, farandi inn í gravhýsið, sóu tær ein ungan mann, sitandi høgrumegin, klæddur í eitt sítt hvítt klæði; og tær vórðu ræðsluslignar.
6 Og hann sigur við tær, Verðið ikki ræðsluslignar: Tit søkja *eftir* Jesusi úr Nazareth, sum varð

krossfestur: hann er *upp*risin; hann er ikki her: síggið staðið har teir løgdu hann.

7 Men farið tykkara veg, sigið hansara lærusveinum og Pæturi, at hann fer undan tykkum inn í Galilēu: har skulu tit síggja hann, eins og hann segði tykkum.

8 Og tær fóru út skundisligani, og flýddu frá gravhýsinum; tí at tær skulvu og vóru ógvaðar: eiheldur søgdu tær nakað til nakran *mann;* tí at tær vóru ræddar.

9 ¶ Nú, tá ið *Jesus* var *upp*risin árla hin fyrsta *dagin* av vikuni, birtist hann fyrst fyri Mariu Măgdă-lē´-nŭ, út úr hvørji hann hevði kastað sjey djevlar.

10 *Og* hon fór og segði teimum sum høvdu verið við honum, sum teir syrgdu og grótu.

11 Og teir, tá ið teir høvdu hoyrt at hann var livandi, og hevði verðið sæddur av henni, trúðu ikki.

12 ¶ Eftir tað birtist hann tveimum av teimum í einum øðrum formi, sum teir gingu, og fóru út á landið.

13 Og teir fóru og søgdu restini *frá tí:* eiheldur trúðu teir teimum.

14 ¶ Síðan birtist hann teimum ellivu, sum teir sótu til matar, og átalaði teir fyri teirra vantrúgv og harðleika av hjarta, av tí at teir trúðu ikki teimum sum høvdu sæð hann, eftir *at* hann var *upp*risin.

15 Og hann segði við teir, Farið tit inn í allan heimin, og prædikið gleðiboðskapin fyri hvørjum skapningi.

16 Hann, ið trýr og verður doyptur, skal vera frelstur; men hann, ið trýr ikki, skal vera heldømdur.

17 Og hesi tekin skulu fylgja teimum sum trúgva; Í navni mínum skulu tey kasta út djevlar; tey skulu tala við nýggjum tungum;

18 Tey skulu taka upp høggormar; og um tey drekki nakað deyðiligt ting, tað skal ikki saka tey; tey skulu leggja hendur á tey sjúku, og tey skulu koma fyri seg.

19 ¶ So síðan eftir *at* Harrin hevði talað við teir, varð hann móttikin upp inn í himin, og settist við høgru hond Guðs.

20 Og teir fóru út, og prædikaðu allar staðir, Harrin virkandi við *teimum,* og staðfestandi orðið við teknum fylgjandi. Á-mēn.

EVANGELIIÐ SAMBÆRT
ST. LUKASI.

KAPITUL 1

VIÐ tað at mangir hava tikið fyri hond at leggja fram hvørt eftir øðrum eina frágreiðing um tey ting, sum eru mest vissuliga trúð á okkara millum,

2 Enntá sum teir avhendu okkum tey, sum frá byrjanini vóru eygnavitnir, og tænarar orðsins;

3 Tóktist tað gott fyri mær eisini, havandi havt fullkomiligt skil á øllum tingum frá tí allar fyrsta, at skriva til tín í raðfylgju, mest hávirdi Thē-ō´-phĭ-lŭs,

4 At tú mást kenna vissu teirra luta, í hvørjum tú ert vorðin undirvístur.

5 ¶ TAÐ var á døgum Heródesar, Judæu kongs, ein ávísur prestur, nevndur Zăch-ă-rī´-ăs, av Á´-bĭ-ă skifti: og kona hansara *var* av døtrum Aarons, og hennara navn *var* Elisabeth.

6 Og tey vóru bæði rættvís frammi fyri Guði, gangandi í øllum boðum og fyriskipanum Harrans ólastandi.

7 Og tey høvdu einkið barn, av tí at Elisabeth var óburin,

og tey bæði vóru *nú* væl sligin í árum.

8 Og tað bar á, at meðan hann útførdi prests-embætið frammi fyri Guði í skipanini av sínum skifti,

9 Samsvarandi við siðvenjuna av prests-embætinum, var hansara lutur at brenna roykilsi, tá ið hann fór inn í tempul Harrans.

10 Og øll fjøldin av fólkinum bað uttanfyri um roykilsis-tíðina.

11 Og tað birtist honum ein eingil Harrans, standandi høgrumegin við roykilsis-altarið.

12 Og tá ið Zach-ă-rí´-ăs sá *hann,* varð hann órógvaður, og ótti fell uppá hann.

13 Men eingilin segði við hann, Óttast ikki, Zach-ă-rí´-ăs: tí at bøn tín er hoyrd; og kona tín Elisabeth skal bera tær ein son, og tú skalt kalla navn hansara Jóhannes.

14 Og tú skalt hava frøi og gleði; og mangir skulu fegnast við hansara føðing.

15 Tí at hann skal vera mikil í eygsjón Harrans, og skal drekka hvørki vín ella sterkan drykk; og hann skal verða fyltur við Halga Andanum, enntá frá móðurlívi móður sínar.

16 Og mongum av Ísraels børnum skal hann venda til Harrans Guðs teirra.

17 Og hann skal ganga undan honum í anda og kraft Ē-lí´-ăs-ar, at venda hjørtunum hjá fedrunum til børnini, og hinum ólýdnu til vísdóm hinna rættvísu; at gera tilreiðar eitt fólk, fyribúgvið hjá Harranum.

18 Og Zach-ă-rí´-ăs segði við eingilin, Hvarviðˆ skal eg vita hetta? tí at eg eri ein gamal maður, og kona mín væl sligin í árum.

19 Og svarandi segði eingilin við hann, Eg eri Gabriel, sum standi í nærveru Guðs; og eri sendur at tala við teg, og at sýna tær hesi glaðu tíðindir.

20 Og sí, tú skalt vera málleysur, og ikki førur fyri at tala, inntil tann dag sum hesi ting skulu verða útførd, av tí at tú trýrt ikki orðum mínum, sum skulu verða uppfylt í síni tíð.

21 Og fólkið bíðaði eftir Zach-ă-rí´-ăs-i, og undraðist *yvir* at hann steðgaði so leingi í templinum.

22 Og tá ið hann kom út, fekk hann ikki talað til teirra: og tey varnaðust, at hann hevði sæð eina sjón í templinum: tí hann gjørdi tekin til teirra, og varð verandi málleysur.

23 Og tað bar á, at so skjótt sum dagarnir av hansara tæning vóru fullførdir, fór hann avstað til egna húss síns.

24 Og eftir teir dagarnar varð kona hansara Elisabeth við gitnað, og fjaldi seg fimm mánaðir, sigandi,

25 Soleiðis hevur Harrin farið við mær í døgunum, í hvørjum hann hugdi á *meg,* at taka burt mína vanvirðing millum manna.

26 Og í tí sætta mánaðinum varð eingilin Gabriel sendur frá Guði at einum staði av Galilēu, nevndur Nazareth,

27 Til eina jomfrú, trúlovað einum manni, hvørs navn var Józeph, av húsi Dávids; og navnið hjá jomfrúnni *var* Maria.

28 Og eingilin kom inn til hennara, og segði, Heil *og sæl, tú sum* hátt *ert* yndað, Harrin *er* við tær: vælsignað *ert* tú millum kvenna.

29 Og tá ið hon sá *hann,* varð hon órógvað við hansara framsøgn, og velti í sínum huga, hvørsháttar heilsan hetta mundi vera.

30 Og eingilin segði við hana, Óttast ikki, Maria: tí at tú hevurt funnið yndi hjá Guði.

31 Og sí, tú skalt gita í móðurlívi tínum, og bera fram son, og skalt kalla navn hansara JESUS.

32 Hann skal vera mikil, og skal vera kallaður Sonur hins Hægsta:

og Harrin Guð skal geva honum hásæti faðirs hansara Dávids:
33 Og hann skal ráða yvir húsi Jákobs um ævir; og á kongadømi hansara skal eingin endi verða.
34 Tá segði Maria við eingilin, Hvussu skal hetta verða, við tað at eg kenni ikki mann?
35 Og eingilin svaraði og segði við hana, Halgi Andin skal koma uppá teg, og kraft hins Hægsta skal skugga yvir teg: tí skal eisini hin heilagi lutur, sum skal verða føddur av tær, vera kallaður Sonur Guðs.
36 Og sí, skyldkona tín Elisabeth, hon hevur eisini gitið son á gamalsaldri sínum: og hetta er hin sætti mánaðurin hjá henni, sum varð kallað ófrukt.
37 Tí við Guði skal einkið vera ógjørligt.
38 Og Maria segði, Sí tænastukvinnu Harrans; verði mær samsvarandi við orð títt. Og eingilin fór avstað frá henni.
39 Og Maria reistist í teimum døgum, og fór inn í fjallalendið við skundi, inn í ein stað av Juda;
40 Og fór inn í hús Zăch-ă-rī´-ăs-ar, og heilsaði Elisabethi.
41 Og tað bar á, at tá ið Elisabeth hoyrdi heilsan Mariu, spældi burðurin í móðurlívi hennara; og Elisabeth varð fylt við Halga Andanum:
42 Og hon mælti út við harðari rødd, og segði, Vælsignað *ert* tú millum kvenna, og vælsignaður *er* ávøkstur móðurlívs tíns.
43 Og hvaðani *er* hetta mær fyri, at móðir Harra míns skuldi komið til mín?
44 Tí at sí, so skjótt sum røddin av heilsan tíni ljóðaði í oyrum mínum, spældi burðurin í móðurlívi mínum av frøi.
45 Og vælsignað *er* hon sum trúði: tí at tað skal verða ein útinning av teimum tingunum sum vórðu søgd henni frá Harranum.
46 Og Maria segði, Sál mín hátt setur Harran,
47 Og mín andi hevur frøtt *seg* í Guði Frelsara mínum.
48 Tí at hann hevur litið til lítilsvirði tænastukvinnu sínar: tí at sí, hiðanífrá skulu allar ættir vælsignaða meg kalla.
49 Tí at hann, sum er mektigur, hevur gjørt við meg miklar lutir; og heilagt *er* navn hansara.
50 Og hansara miskunn *er* á teimum sum óttast hann frá ætt til ætt.
51 Hann hevur sýnt styrki við armi sínum; hann hevur spjatt hinar hugmóðigu í ímyndanini av teirra hjørtum.
52 Hann hevur stoytt niður hinar mektigu úr *teirra* sætum, og upphevjað teir av lágari støðu.
53 Hann hevur mettað hinar svongu við góðum tingum; og hann hevur sent hinar ríku tómar avstað.
54 Hann hevur hjálpt sínum tænara Ísrael, í endurminning um *sína* miskunn;
55 Sum hann talaði til fedra vára, til Ábrahams, og til sáðs hans um ævir.
56 Og Maria varð hjá henni um tríggjar mánaðir, og vendi aftur til egna húss síns.
57 Nú, tann fulla tíðin hjá Elisabethi kom, at hon skuldi verða loyst; og hon bar fram ein son.
58 Og hennara grannar og hennara frændur hoyrdu hvussu Harrin hevði sýnt mikla miskunn omanyvir hana; og tey fegnaðust við henni.
59 Og tað bar á, at á tí áttanda deginum komu teir at umskera barnið; og teir kallaðu hann Zăch-ă-rī´-ăs, eftir navni faðirs hansara.
60 Og móðir hansara tók til orða og segði, Ikki *so;* men Jóhannes skal hann verða kallaður.
61 Og teir søgdu við hana, Tað

er eingin av skyldfólki tínum sum er kallaður við hesum navninum.
62 Og teir gjørdu tekin˘ til faðirs hansara, hvussu hann vildi hava hann kallaðan.
63 Og hann bað um eina skrivitalvu, og skrivaði, sigandi, Jóhannes er navn hansara. Og tey undraðust øll.
64 Og hansara munnur varð upplatin alt fyri eitt, og hansara tunga *loyst,* og hann talaði, og prísaði Guði.
65 Og ótti kom á øll sum búðu rundan um tey: og allar hesar framsagnir vórðu ljóðaðar útumkring út gjøgnum alt fjallalendi Judæu.
66 Og øll tey, sum hoyrdu *tær,* løgdu *tær* niðurfyri í hjørtum sínum, sigandi, Hvørsháttar barn skal hesin verða! Og hond Harrans var við honum.
67 Og faðir hansara, Zăch-ă-rī´-ăs, varð fyltur við Halga Andanum, og propheteraði, sigandi,
68 Vælsignaður *veri* Harrin Guð Ísraels; tí at hann hevur vitjað og endurloyst sítt fólk,
69 Og hevur reist upp eitt frelsuhorn til okkara í húsi tænara síns Dávids;
70 Eins og hann talaði við˘ munninum á sínum heilagu prophetum, sum hava verið síðan verøldin byrjaði:
71 At vit skuldu verða frelstir frá okkara figgindum, og frá hondini á øllum sum hata okkum;
72 At útinna miskunnina, *fyrijáttað* fyri okkara fedrum, og at minnast sín heilaga sáttmála;
73 Eiðin tann, sum hann svór fyri faðir okkara Ábrahami,
74 At hann vildi veita okkum, at vit, verandi loystir út úr hondini á okkara figgindum, máttu tæna honum uttan ótta,
75 Í heilagleika og rættvísi frammi fyri honum, allar dagar lívs okkara.
76 Og tú, barn, skalt verða kallaður prophetur hins Hægsta: tí at tú skalt ganga undan andliti Harrans, at fyribúgva vegir hans;
77 At geva hansara fólki kunnleika til frelsu við˘ eftirgevingini av teirra syndum,
78 Gjøgnum eymligu miskunn Guðs várs; hvarvið˘ dagglæman av hæddini hevur vitjað okkum,
79 At geva ljós til teirra sum sita í myrkri og *í* skugga deyðans, at leiða okkara føtur inn á friðarvegin.
80 Og barnið vaks, og varð sterkt í anda, og var í oyðimørkunum til dagin av hansara sýning at Ísrael.

KAPITUL 2

OG tað bar á í teimum døgum, at tað fór út ein løgskipan frá Cæsar Augustusi, at allur heimurin skuldi verða skattaður.
2 (*Og* henda skatting varð fyrst gjørd, tá ið Cý-rē´-nī-ūs var landsstjórin av Sýriu.)
3 Og øll fóru at verða skattað, hvør *og* ēin inn í sín egna stað.
4 Og eisini Józeph fór niðan frá Galilēu, út úr staðinum Nazareth, inn í Judæu, til staðar Dávids, sum kallast Bethlehem; (tí at hann var av Dávids húsi og ættarlinju:)
5 At verða skattaður við Mariu, trúlovaða vívi sínum, sum var mikil við barn.
6 Og soleiðis varð tað, at meðan tey vóru har, vórðu dagarnir fullførdir, at hon skuldi verða loyst.
7 Og hon bar fram sín fyrstafødda son, og reivaði hann í sveipingarklæðir, og legði hann í eina krubbu; av tí at tað var einkið rúm fyri teimum í tilhaldshúsinum.
8 Og har vóru, í sama landsumráðinum, hirðar, dvøljandi á markini, haldandi vakt yvir sínum fylgi um nátt*ina.*

9 Og sí, eingil Harrans kom uppá teir, og Harrans dýrd skein rundan um teir: og teir vórðu sára ræddir.
10 Og eingilin segði við teir, Óttist ikki: tí at sí, eg beri tykkum góð tíðindir av miklari frøi, sum skulu vera fyri alt fólk.
11 Tí at tykkum er føddur henda dag í staði Dávids ein Frelsari, sum er Christus Harrin.
12 Og hetta *skal vera* tykkum tekin; Tit skulu finna pinkubarnið reivað í sveipingarklæðir, liggjandi í eini krubbu.
13 Og brádligani var tað hjá einglinum ein fjøld av tí himinska herskaranum, prísandi Guði, og sigandi,
14 Dýrd til Guðs í tí hægsta, og friður á jørð, góður vilji móti monnum.
15 Og tað bar á, sum einglarnir vóru farnir avstað frá teimum inn í himin, søgdu hirðarnir hvør til annan, Lat okkum nú fara enntá til Bethlehem, og sjá hetta ting sum á hevur borið, sum Harrin hevur gjørt kunnugt okkum.
16 Og teir komu við skundi, og funnu Mariu, og Jóseph, og pinkubarnið liggjandi í eini krubbu.
17 Og tá ið teir høvdu sæð *tað,* gjørdu teir kunna útumkring ta framsøgn, sum varð søgd teimum viðvíkjandi hesum barninum.
18 Og øll tey, sum hoyrdu *tað,* undraðust á tey tingini sum vórðu søgd teimum av hirðunum.
19 Men Maria varðveitti allar hesar lutir, og grundaði *yvir teir* í hjarta sínum.
20 Og hirðarnir vendu aftur, dýrðmetandi og prísandi Guði fyri øll tey tingini sum teir høvdu hoyrt og sæð, sum tað varð sagt teimum.
21 Og tá ið átta dagar vóru fullførdir fyri umskeringina av barninum, varð hansara navn kallað JESUS, sum varð soleiðis nevnt av einglinum, áðrenn hann varð gitin í móðurlívinum.
22 Og tá ið dagarnir av hennara reinsan samsvarandi við Móselóg vóru fullførdir, førdu tey hann til Jerusalem, at framseta *hann fram* fyri Harran;
23 (Eins og skrivað stendur í lóg Harrans, Hvørt kallkyn, sum opnar móðurlívið, skal verða kallað heilagt fyri Harranum;)
24 Og at ofra eitt sláturoffur samsvarandi við tað sum er sagt í lóg Harrans, Eitt par av turtildúgvum, ella tvær ungar dúgvur.
25 Og sí, tað var ein maður í Jerusalem, hvørs navn *var* Símeon; og tann sami maðurin *var* rættvísur og frómur, væntandi eftir troystan Ísraels: og Halgi Andin var uppiá honum.
26 Og tað var opinberað honum av Halga Andanum, at hann skuldi ei síggja deyða, fyrrenn hann hevði sæð Christ Harrans.
27 Og hann kom av Andanum inn í templið: og tá ið foreldrini førdu inn barnið Jesus, at gera fyri hann eftir venju lógarinnar,
28 Tá tók hann hann upp í armar sínar, og vælsignaði Guð, og segði,
29 Harri, nú leturt tú tænara tín fara avstað í friði, samsvarandi við orð títt:
30 Tí at míni eygu hava sæð tína frelsu,
31 Sum tú hevurt fyribúgvið fyri andlitinum á øllum fólki;
32 Eitt ljós at lýsna Heidningarnar, og dýrdin hjá fólki tínum Ísrael.
33 Og Jóseph og móðir hansara undraðust á tey tingini sum vórðu talað um hann.
34 Og Símeon vælsignaði tey, og segði við Mariu, móður hansara, Sí, hetta *barnið* er sett til fallið og reisingina aftur av mongum í Ísrael; og til eitt tekin sum skal verða talað ímóti;

35 (Ja, eitt svørð skal gata ígjøgnum tína egnu sál við,) at hugsanirnar hjá mongum hjørtum mega verða opinberaðar.

36 Og har var ēin Anna, ein prophetinna, dóttir Phā´-nŭ-ĕl-s, av ættargrein Ā´-sĕr-s: hon var við miklan aldur, og hevði livað við einum ektamanni sjey ár frá árunum av sínum jomfrúdómi;

37 Og hon *var* ein einkja av umleið fýrsinstjúgu og fýra árum, sum veik ikki frá templinum, men tænti *Guði* við føstum og bønum nátt og dag.

38 Og hon, komandi í teirri løtu, veitti somuleiðis Harranum tøkkir, og talaði um hann fyri øllum teimum sum væntaðu eftir endurloysing í Jerusalem.

39 Og tá ið tey høvdu útint øll ting samsvarandi við lóg Harrans, vendu tey aftur inn í Galilēu, til sín egna stað Nazareth.

40 Og barnið vaks, og varð sterkt í anda, fyltur við vísdómi: og Guðs náði var uppiá honum.

41 Nú, foreldur hansara fóru til Jerusalem hvørt ár við umleyps-hátíðina.

42 Og tá ið hann var tólv ára gamalur, fóru tey niðan til Jerusalem eftir venju hátíðarinnar.

43 Og tá ið tey høvdu fullført dagarnar, sum tey vendu aftur, dvaldi barnið Jesus eftir í Jerusalem; og Jóseph og móðir hansara vitstu ikki *av tí*.

44 Men tey, haldandi hann at hava verið í samlaginum, ferðaðust eina dagsferð; og tey søktu hann millum skyldfólks *síns* og kunninga.

45 Og tá ið tey funnu hann ikki, vendu tey aftur aftur til Jerusalem, søkjandi hann.

46 Og tað bar á, at eftir tríggjar dagar funnu tey hann í templinum, sitandi mitt millum lærumeistaranna, bæði hoyrandi teir, og spyrjandi teir spurningar.

47 Og allir, sum hoyrdu hann, vórðu ovfarnir yvir hansara vitsku og svør.

48 Og tá ið tey sóu hann, ógvaðust tey: og móðir hansara segði við hann, Sonur, hví hevurt tú soleiðis farið við okkum? sí, faðir tín og eg hava søkt teg syrgjandi.

49 Og hann segði við tey, Hvussu er tað, at tit søktu meg? vitstu tit ikki, at eg má vera um gerning Faðirs míns?

50 Og tey skiltu ikki framsøgnina sum hann talaði við tey.

51 Og hann fór oman við teimum, og kom til Nazareth, og var undirgivin yvirfyri teimum: men móðir hansara varðveitti allar hesar framsagnir í sínum hjarta.

52 Og Jesus tók til í vísdómi og vøkstri, og í yndi hjá Guði og monnum.

KAPITUL 3

NÚ, í tí fimtanda stjórnarárinum hjá Tī-bē´-rī-ŭs Çæsar, Pontius Pilatus verandi landsstjóri av Judæu, og Heródes verandi fjórðingsfúrsti av Galilēu, og hansara bróðir Philippus fjórðingsfúrsti av Ĭ-tŭ-rē´-ŭ og av Trăchō-nī´-tĭs umráðinum, og Lý-să´-nĭ-ăs fjórðingsfúrsti av Â-bĭ-lē´-nē,

2 Ān´-năs og Cāi´-â-phăs verandi høvuðsprestarnir, kom Guðs orð til Jóhannesar Zăch-ă-rī´-ăs-ar sonar í oyðuni.

3 Og hann kom inn í alt landið kring Jordan, prædikandi umvendingardópin til eftirgeving syndanna;

4 Eins og skrivað stendur í bókini við orðunum hjá Ê-sāi´-ăs-i prophęti, sigandi, Røddin á ēinum, rópandi í oyðimørkini, Fyribúgvið tit veg Harrans, gerið gøtur hansara beinar.

5 Hvør dalur skal verða fyltur, og hvørt fjall og *hvør* heygur skal verða førdur lágt; og tað krókuta skal verða gjørt beint, og teir

knortlutu vegirnir *skulu verða* gjørdir slættir;
6 Og alt kjøt skal sjá Guðs frelsu.
7 Tá segði hann við mannfjøldina sum kom út at verða doypt av honum, O avkom av høggormum, hvør hevur ávarað tykkum at flýggja frá hini komandi vreiðini?
8 Berið fram tessvegna ávøkstir, verdigir av umvending, og byrjið ikki at siga innan í tykkum sjálvum, Vit hava Ábraham til faðir *okkara:* tí at eg sigi tykkum, At Guð er mentur av hesum steinum at reisa upp børn at Ábrahami.
9 Og nú eisini er øksin løgd at rótini á trøunum: hvørt træ tessvegna, sum ber ikki fram góðan ávøkst, verður høgt niður, og kastað inn í eldin.
10 Og fólkið spurdi hann, sigandi, Hvat skulu vit tá gera?
11 Hann svarar og sigur við tey, Hann ið hevur tveir kyrtlar, lat hann tilluta til hansara sum hevur ongan; og hann ið hevur mat, lat hann gera líkaleiðis.
12 Tá komu eisini tollarar at verða doyptir, og søgdu við hann, Meistari, hvat skulu vit gera?
13 Og hann segði við teir, Krevjið ikki meira enn tað sum er tilskilað tykkum.
14 Og hermenninir somuleiðis kravdu av honum, sigandi, Og hvat skulu vit gera? Og hann segði við teir, Innið harðskap ímóti ongum manni, eiheldur ákærið *nakran* falsliga; og verið nøgdir við løn tykkara.
15 Og, sum fólkið var í væntan, og allir menn grundaðu í sínum hjørtum um Jóhannes, hvørt hann var Christus˜, ella ei;
16 Svaraði Jóhannes, sigandi við *tey* øll, Eg vissuliga doypi tykkum við vatni; men ēin, mektigari enn eg, kemur, tvongina á hvørs skóm eg eri ikki verdigur at loysa upp: hann skal doypa tykkum við Halga Andanum og við eldi:
17 Hvørs kastiskuvla *er* í hond hans, og hann vil dyggiliga reinska gólv sítt, og vil savna hveitið inn í løðu sína; men dumbuna vil hann brenna við eldi ósløkkiligum.
18 Og mong onnur ting í síni formaning prædikaði hann fólkinum.
19 Men fjórðingsfúrstin Heródes, verandi írættasettur av honum fyri Hē-ró-dī´-ās, konu Philippusar, bróður síns, og fyri øll tey illindir sum Heródes hevði gjørt,
20 Legði enn hetta afturat omaná alt, at hann lokaði Jóhannes inni í fongsul.
21 Nú, meðan alt fólkið varð doypt, bar tað á, at Jesus eisini verðandi doyptur, og biðjandi, varð himinin opnaður,
22 Og Halgi Andin steig niður í likamligum skapi sum ein dúgva uppá hann, og ein rødd kom frá himni, sum segði, Tú ert mín háttelskaði Sonur; í tær eg eri væl toknaður.
23 Og Jesus sjálvur byrjaði at vera um tríati ára gamalur, og var (sum varð hildið) sonur Jóseph, sum var *sonur* Hē´-lī-s,
24 Sum var *sonur* Măt´-thăt-s, sum var *sonur* Levī-s, sum var *sonur* Měl´-chī-s, sum var *sonur* Jăn´-nă, sum var *sonur* Jóseph,
25 Sum var *sonur* Măt-tă-thī´-ās-ar, sum var *sonur* Amosar, sum var *sonur* Ná´-ŭm-s, sum var *sonur* Ēs´-lī-s, sum var *sonur* Năg´-gī-s,
26 Sum var *sonur* Má´-ăth-s, sum var *sonur* Măt-tă-thī´-ās-ar, sum var *sonur* Sĕm´-ē-ī-s, sum var *sonur* Joseph, sum var *sonur* Juda,
27 Sum var *sonur* Jó-ăn´-nă, sum var *sonur* Rhē´-sâ, sum var *sonur* Zô-rô-bá´-bĕl-s, sum var *sonur* Să-lá´-thī-ĕl-s, sum var *sonur* Nē´-rī-s,
28 Sum var *sonur* Měl´-chī-s, sum var *sonur* Ăd´-dī-s, sum var *sonur* Cō´-săm-s, sum var *sonur* Ēl´-mô-dăm-s, sum var *sonur* Ēr-s,
29 Sum var *sonur* Jó´-sī-s, sum

var *sonur* Êl-ī-ē´-zĕr-s, sum var *sonur* Jó´-rĭm-s, sum var *sonur* Măt´-thăt-s, sum var *sonur* Levī-s,
30 Sum var *sonur* Símeons, sum var *sonur* Juda, sum var *sonur* Jósephs, sum var *sonur* Jó´-năn-s, sum var *sonur* Ē´-lī-ă-kĭm-s,
31 Sum var *sonur* Měl´-ĕ-ă, sum var *sonur* Mē´-năn-s, sum var *sonur* Măt´-tă-thă, sum var *sonur* Náthans, sum var *sonur* Dávids,
32 Sum var *sonur* Ísai-s, sum var *sonur* Ō´-bĕd-s, sum var *sonur* Bó´-ŏz-ar, sum var *sonur* Săl´-mŏn-s, sum var *sonur* Ná-ăs´-sŏn-s,
33 Sum var *sonur* Ă-mĭn´-ă-dăb-s, sum var *sonur* Ár´-ăm-s, sum var *sonur* Ēs´-rŏm-s, sum var *sonur* Phâr´-ĕs-ar, sum var *sonur* Juda,
34 Sum var *sonur* Jákobs, sum var *sonur* Ísaaks, sum var *sonur* Ábrahams, sum var *sonur* Thár´-ă, sum var *sonur* Ná´-chôr-s,
35 Sum var *sonur* Sár´-ŭch-s, sum var *sonur* Rā´-gāū-s, sum var *sonur* Phā´-lĕk-s, sum var *sonur* Hē´-bĕr-s, sum var *sonur* Să´-lâ,
36 Sum var *sonur* Câ-ī´-năn-s, sum var *sonur* Ăr-phăx´-ăd-s, sum var *sonur* Sems, sum var *sonur* Nó´-ă, sum var *sonur* Lá´-mĕch-s,
37 Sum var *sonur* Mă-thū´-să-lă, sum var *sonur* Ē´-nŏch-s, sum var *sonur* Já´-rĕd-s, sum var *sonur* Măl´-ĕ-lēēl-s, sum var *sonur* Câ-ī´-năn-s,
38 Sum var *sonur* Ē´-nŏs-ar, sum var *sonur* Seths, sum var *sonur* Adams, sum var *sonur* Guðs.

KAPITUL 4

OG Jesus, verandi fullur av Halga Andanum, vendi aftur frá Jordan, og varð leiddur av Andanum inn í oyðuna,
2 Verðandi fjøruti dagar freistaður av djevlinum. Og í teimum døgum át hann einkið: og tá ið teir vóru endaðir, hungraði hann umsíðir.
3 Og djevulin segði við hann, Um tú veri Sonur Guðs, ábjóða hesum steini, at hann verði gjørdur breyð.
4 Og Jesus svaraði honum, sigandi, Skrivað stendur, At maður skal ikki liva av breyði eina, men av hvørjum orði Guðs.
5 Og djevulin, takandi hann niðan á eitt høgt fjall, sýndi honum øll kongadømir heimsins í einum tíðarbragdi.
6 Og djevulin segði við hann, Allan henda mátt vil eg geva tær, og dýrdina av teimum: tí at tað er fingið mær; og til hvørssumhelst eg vil, gevi eg tað.
7 Um tú tí vilt tilbiðja meg, skal alt verða títt.
8 Og Jesus svaraði og segði við hann, Slepp tær afturum meg, Satan: tí at skrivað stendur, Tú skalt tilbiðja Harran Guð tín, og honum eina skalt tú tæna.
9 Og hann førdi hann til Jerusalem, og setti hann á eitt torn av templinum, og segði við hann, Um tú veri Sonur Guðs, kasta teg niður hiðani:
10 Tí at skrivað stendur, Hann skal geva einglum sínum álegging yvir teg, at varða teg:
11 Og í *sínum* hondum skulu teir bera teg uppi, at ikki tú til nakra tíð slái tín fót ímóti einum steini.
12 Og svarandi segði Jesus við hann, Tað er sagt, Tú skalt ikki freista Harran Guð tín.
13 Og tá ið djevulin hevði endað alla freistingina, fór hann burtur frá honum í eina tíð.
14 ¶ Og Jesus kom aftur í kraft Andans inn í Galilēu: og tað fór út eitt giti um hann ígjøgnum alt umráðið rundan um.
15 Og hann frálærdi í sýnagogum teirra, verðandi dýrðmettur av øllum.
16 ¶ Og hann kom til Nazareth, har hann hevði verðið uppaldur: og, sum hansara venja var, fór hann inn í sýnagoguna á sabbatsdeginum, og stóð upp fyri at lesa.

17 Og tað varð fingin honum bók Ê-sâĭ´-ăs-ar prophets. Og tá ið hann hevði opnað bókina, fann hann staðið har tað stóð skrivað,

18 Andi Harrans *er* uppiá mær, av tí at hann hevur salvað meg til at prædika gleðiboðskapin fyri hinum fátæku; hann hevur sent meg at grøða tey hjartabrotnu, at prædika útfrían fyri teimum bundnu, og endurheintan av sjón fyri hinum blindu, at seta í frælsi tey sum eru knúst,

19 At prædika góðtokkaliga ár Harrans.

20 Og hann læt aftur bókina, og gav *hana* aftur til tænaran, og settist niður. Og eyguni á øllum teimum, sum vóru í sýnagoguni, vóru fest á hann.

21 Og hann byrjaði at siga við tey, Henda dag er hetta skrift*staðið* uppfylt fyri oyrum tykkara.

22 Og øll bóru honum vitni, og undraðust á tey náðisomu orðini sum útgingu út úr munni hansara. Og tey søgdu, Er ikki hetta sonur Jósephs?

23 Og hann segði við tey, Tit vilja vissuliga siga við meg hetta orðtakið, Lækni, grøð teg sjálvan: hvatsumhelst *ið* vit hava hoyrt gjørt í Că-pĕr´-nă-ŭm, ger eisini her í landi tínum.

24 Og hann segði, Sanniliga sigi eg tykkum, Eingin prophetur er viðurkendur í sínum egna landi.

25 Men eg sigi tykkum av sonnum, mangar einkjur vóru í Ísrael á døgum Ê-lĭ´-ăs-ar, tá ið himinin varð lokaður fyri *í* trý ár og seks mánaðir, tá ið mikil hungursneyð var út gjøgnum alt landið;

26 Men at ongari av teimum varð Ê-lĭ´-ăs sendur, uttan at Sârĕp´-tŭ, *einum staði* Sĭ´-dŏn-s, at eini kvinnu *sum var* ein einkja.

27 Og mangir spitalskir vóru í Ísrael á tíð Êl-ĭ-sē´-ŭs-ar prophets; og eingin av teimum varð reinsaður, uttan Sýriulendingurin Ná´-ă-măn.

28 Og øll tey í sýnagoguni, tá ið tey hoyrdu hesi tingini, vórðu fylt við vreiði,

29 Og risu upp, og stoyttu hann út úr staðinum, og leiddu hann at eggini á heygginum, hvará teirra staður var bygdur, at tey máttu kastað hann oman eftir høvdinum.

30 Men hann, farandi ígjøgnum miðju teirra, fór sín veg,

31 Og kom oman til Că-pĕr´-nă-ŭm, ein stað av Galilēu, og lærdi tey á sabbatsdøgunum.

32 Og tey vóru ovfarin yvir hansara Guðslæru: tí at orð hansara var við kraft.

33 ¶ Og í sýnagoguni var ein maður, sum hevði ein anda av einum óreinum djevli, og geylaði út við harðari rødd,

34 Sigandi, Lat *okkum* vera; hvat hava vit at gera við teg, *tú* Jesus úr Nazareth? ert tú komin at oyða okkum? eg kenni teg hvør tú ert; Hin Heilagi Guðs.

35 Og Jesus hartaði hann, sigandi, Halt friði tínum, og kom út úr honum. Og tá ið djevulin hevði kastað hann í miðjuna, kom hann út úr honum, og meinti hann ikki.

36 Og tey vórðu øll ógvaði, og talaðu sín ámillum, sigandi, Hvat *fyri* eitt orð *er* hetta! tí at við myndugleika og kraft býður hann teimum óreinu andunum, og teir koma út.

37 Og gitið um hann fór út í hvørt pláss av landinum runt umkring.

38 ¶ Og hann reistist út úr sýnagoguni, og fór inn í hús Símunar. Og móðir konu Símunar var tikin við eini miklari hitasótt; og teir bønaðu hann fyri hana.

39 Og hann stóð yvir henni, og hartaði hitasóttina; og hon fór frá henni: og alt fyri eitt reistist hon og tænti teimum.

40 ¶ Nú, tá ið sólin var farandi til viðar, førdu øll tey, sum høvdu nakran sjúkan við ymsum sjúkdómum, tey til hansara; og hann legði sínar hendur á hvønn *og* ēin av teimum, og grøddi tey.

41 Og djevlar eisini komu út úr mongum, geylandi út, og sigandi, Tú ert Christus — Sonur Guðs. Og, hartandi *teir,* loyvdi hann teimum ikki at tala: tí at teir vitstu at hann var Christus.

42 Og tá ið tað var dagur, fór hann avstað og fór inn á eitt oyðistað: og fólkið søkti hann, og kom at honum, og helt honum *aftur,* at hann skuldi ikki fara avstað frá teimum.

43 Og hann segði við tey, Eg má prædika kongadømi Guðs fyri øðrum staðum eisini: tí at tessvegna eri eg sendur.

44 Og hann prædikaði í sýnagogunum av Galilēu.

KAPITUL 5

OG tað bar á, at sum fólkið trýsti uppá hann *fyri* at hoyra Guðs orð, stóð hann við Gēn-nēs´-â-rēt-s vatnið,

2 Og sá tveir bátar liggjandi við vatnið: men fiskimenninir vóru farnir út úr teimum, og tvógu gørn *síni.*

3 Og hann fór inn í ēin av bátunum, sum var Símunar, og bað hann, at hann vildi trýst út eitt sindur frá landinum. Og hann settist niður, og lærdi fólkið úr bátinum.

4 Nú, tá ið hann var givin at tala, segði hann við Símun, Legg út á dýpið, og slepp niður gørnunum hjá tær til ein drátt.

5 Og svarandi segði Símun við hann, Meistari, vit hava strevast alla náttina, og hava einkið fingið: hóast hetta, eftir tínum orði vil eg sleppa niður garninum.

6 Og tá ið teir hetta høvdu gjørt, kringsettu teir eina stóra fjøld av fiskum: og teirra garn skrædnaði.

7 Og teir veittraðu til lagsmenn *sínar,* sum vóru í hīnum bátinum, at teir skuldu koma og hjálpa teimum. Og teir komu, og fyltu báðar bátarnar, so at teir byrjaðu at søkka.

8 Tá ið Símun Pætur sá *tað,* fell hann niður við Jesu knø, sigandi, Far burtur frá mær; tí at eg eri ein syndafullur maður, O Harri.

9 Tí at hann var ovfarin, og allir ið við honum vóru, yvir dráttin av fiskunum sum teir høvdu fingið:

10 Og tað *var* eisini Jákob, og Jóhannes, synir Zĕb-ē-dēē´-ŭs-ar, sum vóru lagsmenn Símunar. Og Jesus segði við Símun, Óttast ikki; hiðanífrá skalt tú veiða menn.

11 Og tá ið teir høvdu ført sínar bátar til lands, yvirgóvu teir alt, og fylgdu honum.

12 ¶ Og tað bar á, tá ið hann var í einum ávísum staði, sí ein maður, fullur av spitalskni: sum, síggjandi Jesus, fell á *sítt* andlit, og bønaði hann, sigandi, Harri, um tú vilt, tú kanst gera meg reinan.

13 Og hann rætti fram *sína* hond, og nam við hann, sigandi, Eg vil: veri tú reinur. Og alt fyri eitt fór spitalskusjúkan burtur frá honum.

14 Og hann álegði honum at siga ongum manni frá: men far, og sýn teg fyri prestinum, og ofra fyri reinsan tína, samsvarandi sum Móses bjóðaði, til ein vitnisburð yvirfyri teimum.

15 Men so mikið meira fór tað eitt giti útumkring um hann: og miklar mannfjøldir komu saman at hoyra, og at verða grøddar av honum frá sínum veikleikum.

16 ¶ Og hann hevði seg undan inn í oyðuna, og bað.

17 Og tað hendi á einum ávísum degi, sum hann frálærdi, at har vóru Pharisēarar og lærumeistarar av lógini sitandi hjá,

sum vóru komnir út úr hvørjum býi av Galilēu, og Judæu, og Jerusalem: og kraft Harrans var *tilstaðar* at grøða tey.

18 ¶ Og sí, menn førdu í eini song ein mann, sum var tikin við einum lamningi: og teir søktu *brøgd* at føra hann inn, og at leggja *hann* framfyri hann.

19 Og tá ið teir ei kundu finna, við^ hvørji *leið* teir máttu ført hann inn uppá grund av mannamúgvuni, fóru teir upp á tekjuna, og sigu hann niður ígjøgnum taksteinarnar við *hansara* legu inn í miðjuna framfyri Jesus.

20 Og tá ið hann sá trúgv teirra, segði hann við hann, Maður, syndir tínar eru fyrigivnar tær.

21 Og hinir skriftlærdu og Pharisēararnir byrjaðu at umhugsast, sigandi, Hvør er hesin sum talar Guðsspottanir? Hvør kann fyrigeva syndir, uttan Guð eina?

22 Men tá ið Jesus varnaðist teirra hugsanir, segði hann svarandi við teir, Hvat umhugsa tit í hjørtum tykkara?

23 Hvørt er lættari, at siga, Syndir tínar veri fyrigivnar tær; ella at siga, Rís upp og gakk?

24 Men *fyri* at tit mega vita, at Menniskjusonurin hevur mátt uppiá jørð at fyrigeva syndir, (segði hann við hin sjúka av lamninginum,) Eg sigi tær, Reis *teg,* og tak upp legu tína, og far inn í hús títt.

25 Og í stundini reis hann upp frammi fyri teimum, og tók upp tað, hvará hann lá, og fór avstað heim til egna húss síns, dýrðmetandi Guð.

26 Og tey vórðu øll ógvað, og tey dýrðmettu Guð, og vórðu fylt við ótta, sigandi, Vit hava sæð undarlig ting í dag.

27 ¶ Og eftir hesi tingini fór hann fram, og sá ein tollara, nevndan Levī, sitandi við tollheimtu*búð*ina: og hann segði við hann, Fylg mær.

28 Og hann eftirlæt alt, reis upp, og fylgdi honum.

29 Og Levī gjørdi honum eina mikla veitslu í sínum egna húsi: og har var eitt stórt samlag av tollarum og av øðrum sum sótu niðri við teimum.

30 Men teirra skriftlærdu og Pharisēarar knarraðu innáhansara lærusveinar, sigandi, Hví eta tit og drekka við tollarum og syndarum?

31 Og svarandi segði Jesus við teir, Teimum ið eru heilir, tarvast ikki lækna; men teimum ið eru sjúkir.

32 Eg kom ikki at kalla hinar rættvísu, men syndarar til umvendingar.

33 ¶ Og teir søgdu við hann, Hví fasta lærusveinarnir hjá Jóhannesi ofta, og halda bønir, og somuleiðis *lærusveinarnir* hjá Pharisēarunum; men tínir eta og drekka?

34 Og hann segði við teir, Kunnu tit fáa brúðarkamars-børnini at fasta, meðan brúðgómurin er hjá teimum?

35 Men teir dagar vilja koma, tá ið brúðgómurin skal verða tikin burtur frá teimum, og tá skulu tey fasta í teimum døgum.

36 ¶ Og hann talaði teimum eisini eina dømisøgu; Eingin maður setur eitt stykki av einum nýggjum klæði uppá eitt gamalt; um annars, tá bæði tað nýggja ger eina skræðing, og tað stykkið, sum varð *tikið* úr tí nýggja, einast ikki *saman* við tað gamla.

37 Og eingin maður koyrir nýtt vín í gamlar kíkar; annars vil tað nýggja vínið bresta kíkarnar, og stoytast, og kíkarnir skulu týnast.

38 Men nýtt vín má verða koyrt í nýggjar kíkar; og bæði verða varðveitt.

39 Eingin maður eisini, havandi drukkið gamalt *vín,* beinanvegin tráar nýtt: tí at hann sigur, Tað gamla er betri.

KAPITUL 6

OG tað hendi á øðrum sabbatinum eftir hin fyrsta, at hann fór ígjøgnum korn akrarnar; og hansara lærusveinar slitu øksini av korni, og ótu, gníggjandi *tey* í hondum *sínum*.

2 Og ávísir av Pharisēarunum søgdu við teir, Hví gera tit tað sum er ikki lógligt at gera á sabbatsdøgunum?

3 Og svarandi teimum segði Jesus, Hava tit ikki lisið so mikið sum hetta, hvat Dávid gjørdi, tá ið sjálvur hann var ein hungraður, og teir sum við honum vóru;

4 Hvussu hann fór inn í hús Guðs, og tók og át sýnisbreyðini, og gav eisini til teirra sum við honum vóru; sum tað er ikki lógligt at eta, uttan hjá prestunum eina?

5 Og hann segði við teir, At Menniskjusonurin er Harri eisini hjá sabbatinum.

6 Og tað bar á eisini á einum øðrum sabbati, at hann fór inn í sýnagoguna og frálærdi: og har var ein maður, hvørs høgra hond var visnað.

7 Og hinir skriftlærdu og Pharisēararnir eygleiddu hann, hvørt hann vildi gróða á sabbatsdeginum; at teir máttu funnið eina ákæru ímóti honum.

8 Men hann kendi teirra hugsanir, og segði til mannin sum hevði ta visnaðu hondina, Rís upp, og stíg fram í miðjuna. Og hann reistist og steig fram.

9 Síðan segði Jesus við teir, Eg vil spyrja tykkum ēitt ting; Er tað lógligt á sabbatsdøgunum at gera gott, ella at gera ilt? at frelsa lív, ella at oyða *tað?*

10 Og, hyggjandi runt umkring uppá teir allar, segði hann við mannin, Strekk fram hond tína. Og hann so gjørdi: og hans hond varð gjørd aftur heil, eins og hīn.

11 Og teir vórðu fyltir við ørskapi; og samtalaðu hvør við annan, hvat teir máttu gjørt við Jesus.

12 Og tað bar á í teimum døgum, at hann fór út á eitt fjall at biðja, og helt áfram alla nátt í bøn til Guðs.

13 ¶ Og tá ið tað var dagur, kallaði hann *at sær* sínar lærusveinar: og av teimum valdi hann tólv, sum eisini hann nevndi ápostlar;

14 Símun, (hvønn hann eisini nevndi Pætur;) og Andreas, bróður hansara; Jákob og Jóhannes, Philippus og Bartholomæus,

15 Matthæus og Tummas; Jákob, *son* Äl-phæ´-ūs-ar; og Símun, kallaður Zē-lō´-tēs;

16 Og Judas, *bróður* Jákobs; og Judas Iscariot, sum eisini var svíkjarin.

17 ¶ Og hann kom oman við teimum, og stóð á slættanum, og flokkurin av hansara lærusveinum, og ein mikil fjøld av fólki út úr allari Judæu og Jerusalem, og frá sævarstrondini av Týrus og Sī´dōn, sum komu at hoyra hann, og at verða grødd frá sjúkdómum sínum;

18 Og tey sum vóru plágað við óreinum andum: og tey vórðu grødd.

19 Og øll mannfjøldin søkti at nema við hann: tí at tað fór magn út úr honum, og grøddi *tey* øll.

20 ¶ Og hann lyfti upp eygum sínum á lærusveinar sínar, og segði, Signaðir *veri tit* fátæku: tí at tykkara er kongadømi Guðs.

21 Signaðir *eru tit* ið hungra nú: tí at tit skulu verða mettaðir. Signaðir *eru tit* ið gráta nú: tí at tit skulu læa.

22 Signaðir eru tit, tá ið menn skulu hata tykkum, og tá ið teir skulu skilja tykkum *frá flokki sínum,* og skulu brigsla *tykkum,* og kasta út tykkara navn sum ilt, fyri Menniskjusonarins skuld.

23 Fegnist tit á tí degi, og leypið

av frøi: tí at sí, tykkara endurgjald *er* mikið í himni: tí á líkan hátt gjørdu teirra fedrar við prophetarnar.

24 Men vei tykkum sum eru ríkir! tí at tit hava tikið við troystan tykkara.

25 Vei tykkum sum eru mettir! tí at tit skulu hungra. Vei tykkum sum nú læa! tí at tit skulu harmast og gráta.

26 Vei tykkum, tá ið allir menn skulu tala væl um tykkum! tí at soleiðis gjørdu teirra fedrar við teir følsku prophetarnar.

27 ¶ Men eg sigi við tykkum sum hoyra, Elskið tykkara fíggindar, gerið væl mót teimum ið hata tykkum,

28 Vælsignið tey sum banna tykkum, og biðjið fyri teimum sum illviljani brúka tykkum.

29 Og honum sum slær teg á *annan* vangan, bjóða hin við; og honum sum tekur burt tína kápu, sýt ikki *at taka* kyrtil *tín* við.

30 Gev til hvønn mann sum umbiður frá tær; og frá honum, sum tekur burtur góðs títt, bið ikki um *tað* aftur.

31 Og eins og tit vildu, at menn skuldu gjørt mót tykkum, gerið tit eisini mót teimum líkaleiðis.

32 Tí um tit elski teir sum elska tykkum, hvørja tøkk hava tit? tí at syndarar eisini elska teir sum elska teir.

33 Og um tit geri væl mót teimum sum væl gera mót tykkum, hvørja tøkk hava tit? tí at syndarar eisini gera enntá tað sama.

34 Og um tit læni *til teirra*, frá hvørjum tit vóna at móttaka aftur, hvørja tøkk hava tit? tí at syndarar eisini læna til syndarar, at móttaka eins mikið aftur.

35 Men elskið tit tykkara fíggindar, og gerið væl, og lænið, vónandi eftir ongum aftur; og tykkara endurgjald skal vera mikið, og tit skulu vera børnini hjá hinum Hægsta: tí at hann er góður við hini ótakksomu og *við* hini illu.

36 Verið tit tessvegna miskunnsamir, eins og Faðir tykkara eisini er miskunnsamur.

37 Dømið ikki, og tit skulu ikki verða dømdir: fordømið ikki, og tit skulu ikki verða fordømdir: fyrigevið, og tykkum skal verða fyrigivið:

38 Gevið, og tykkum skal verða givið; gott mál, stappað niður, og rist saman, og rennandi yvir, skulu menn geva inn í tykkara fang. Tí at við tí sama máli sum tit mála við, skal tað verða mált til tykkara aftur.

39 Og hann talaði eina dømisøgu til teirra, Kann hin blindi leiða hin blinda? skulu teir ikki báðir falla inn í veitina?

40 Lærusveinurin er ikki omanfyri meistara sínum: men hvør tann, sum er fullkomin, skal verða eins og meistari hansara.

41 Og hví skoðart tú flísina sum er í eyga bróðurs tíns, men varnarst ikki bjálkan sum er í tínum egna eyga?

42 Ella hvussu kanst tú siga við bróður tín, Bróðir, lat meg toga út flísina sum er í eyga tínum, tá ið tú sjálvur skoðart ikki bjálkan sum er í tínum egna eyga? Tín hyklari, kasta út fyrst bjálkan út úr egna eyga tínum, og tá skalt tú síggja klárliga at hála út flísina sum er í eyga bróðurs tíns.

43 Tí eitt gott træ ber ikki fram spiltan ávøkst; eiheldur ber eitt spilt træ fram góðan ávøkst.

44 Tí at hvørt træ kennist av sínum egna ávøksti. Tí av tornum henta menn ikki fikur, eiheldur av tornarunni henta teir vínber.

45 Ein góður maður út úr góðu goymslu hjarta síns ber fram tað sum er gott; og ein óndur maður út úr óndu goymslu hjarta síns ber fram tað sum er ónt: tí av yvirflóð hjartans mælir muður hansara.

46 ¶ Og hví kalla tit meg, Harra, Harra, og gera ikki tey tingini sum eg sigi?

47 Hvørsumhelst *ið* kemur til mín og hoyrir mínar framsagnir, og ger tær, eg vil sýna tykkum við hvønn hann er líkur:

48 Hann er líkur einum manni sum bygdi eitt hús, og gróv djúpt, og legði grundina uppá ein klett: og tá ið flóðin reis, bardi streymurin ógvusligani uppá tað húsið, og kundi ikki rista tað: tí at tað var grundað uppá ein klett.

49 Men hann sum hoyrir og ger ikki, er líkur einum manni sum uttan grundvøll bygdi eitt hús uppá jørðina; ímóti hvørjum streymurin bardi ógvusligani, og alt fyri eitt fell tað; og oyðingin av tí húsi var mikil.

KAPITUL 7

NÚ, tá ið hann hevði endað allar sínar framsagnir í áhoyrn fólksins, fór hann inn í Că-pĕr´nă-ŭm.

2 Og tænarin hjá einum ávísum hundraðsovasta, sum var honum kærur, var sjúkur, og lá fyri deyðanum.

3 Og tá ið hann hoyrdi um Jesus, sendi hann til hansara teir elstu av Jødunum, bønandi hann, at hann vildi komið og grøtt tænara sín.

4 Og tá ið teir komu til Jesu, bønaðu teir hann í stundini, sigandi, At hann var verdigur, fyri hvønn hann skuldi gera hetta:

5 Tí hann elskar tjóð okkara, og hann hevur bygt okkum eina sýnagogu.

6 Tá fór Jesus við teimum. Og tá ið hann var nú ikki fjart frá húsinum, sendi hundraðsovastin vinir til hansara, sigandi við hann, Harri, ger tær ongar ónáðir: tí at eg eri ikki verdigur, at tú skuldirt komið inn undir tekju mína:

7 Hvørsvegna eg eiheldur helt meg verdan at koma til tín: men sig í einum orði, og mín tænari skal verða grøddur.

8 Tí at eg eisini eri ein maður, settur undir harradømi, havandi undir mær hermenn, og eg sigi við ēin, Far, og hann fer; og til ein annan, Kom, og hann kemur; og til tænara mín, Ger hetta, og hann ger *tað*.

9 Tá ið Jesus hoyrdi hesi ting, undraðist hann á hann, og vendi sær umkring, og segði við fólkið sum fylgdi honum, Eg sigi tykkum, eg havi ikki funnið so mikla trúgv, nei, ikki í Ísrael.

10 Og teir, sum vóru sendir, komandi aftur til húsið, funnu tænaran frískan, sum hevði verið sjúkur.

11 ¶ Og tað bar á dagin eftir, at hann fór inn í ein stað, kallaðan Nā´-în; og mangir av hansara lærusveinum fóru við honum, og mikið fólk.

12 Nú, tá ið hann kom nær til staðarportrið, sí, har varð ein deyður maður borin út, ēinasti sonur móður sína, og hon var ein einkja: og mikið fólk úr staðinum var við henni.

13 Og tá ið Harrin sá hana, hevði hann várkunn á hana, og segði við hana, Grát ikki.

14 Og hann kom og nam við børuna: og teir, sum bóru *hann*, stóðu stillir. Og hann segði, Ungi maður, eg sigi við teg, Reis *teg*.

15 Og hann, sum var deyður, settist upp, og tók at tala. Og hann læt hann til móður hansara.

16 Og har kom ein ótti á øll: og tey dýrðmettu Guð, sigandi, At ein mikil prophetur er stigin upp okkara millum; og, At Guð hevur vitjað fólk sítt.

17 Og henda umtala um hann fór út um alla Judæu, og út um alt umráðið runt um.

18 Og lærusveinar Jóhannesar sýndu honum um øll hesi ting.

19 ¶ Og Jóhannes, kallandi *til sín* tveir av sínum lærusveinum, sendi *teir* til Jesu, sigandi, Ert tú hann ið koma skuldi? ella vænta vit eftir einum øðrum?

20 Tá ið menninir vóru komnir til hansara, søgdu teir, Jóhannes Doypari hevur sent okkum til tín, sigandi, Ert tú hann ið koma skuldi? ella vænta vit eftir einum øðrum?

21 Og í tí sama tíma gøddi hann mong frá *teirra* veikleikum og plágum, og frá illum andum; og mongum, *sum vóru* blind, gav hann sjón.

22 Jesus tá svarandi segði við teir, Farið tykkara veg, og sigið Jóhannesi hvørji ting tit hava sæð og hoyrt; hvussu ið hini blindu síggja, hini lamnu ganga, tey spitølsku verða reinsaði, tey deyvu hoyra, tey deyðu verða reist, fyri hinum fátæku verður gleðiboðskapurin prædikaður.

23 Og vælsignaður er *hann,* hvørsumhelst *ið* skal ei fáa meinboga í mær.

24 ¶ Og tá ið sendiboðar Jóhannesar vóru farnir avstað, fór hann undir at tala til fólkið viðvíkjandi Jóhannesi, Hvat fóru tit út í oyðuna fyri at síggja? Ein sevlegg, ristan við vindinum?

25 Men hvat fóru tit út fyri at síggja? Ein mann, klæddan í mjúkan búnað? Sí, teir sum eru yvirdádiga klæddir, og liva marglætisligani, eru í kongshøllum.

26 Men hvat fóru tit út fyri at síggja? Ein prophet? Ja, eg sigi tykkum, og mikið meira enn ein prophet.

27 Hesin er *hann,* um hvønn tað stendur skrivað, Sí, eg sendi mítt sendiboð undan tínum andliti, sum skal fyribúgva veg tín undan tær.

28 Tí at eg sigi tykkum, Millum teirra, sum føddir eru av kvinnum, er tað ikki ein størri prophetur enn Jóhannes Doyparin: men hann, sum er minstur í kongadømi Guðs, er størri enn hann.

29 Og alt fólkið sum hoyrdi *hann,* og tollararnir, rættvísgjørdu Guð, verðandi doypt við dópi Jóhannesar.

30 Men Pharisëararnir og hinir lógkønu vrakaðu Guðs ráðagerð ímóti sær sjálvum, verðandi ikki doyptir av honum.

31 ¶ Og Harrin segði, Við hvat skal eg tá líkna menninar av hesi ætt? og hvørjum eru teir líkir?

32 Teir eru líkir børnum, sitandi á torginum, og kallandi hvør á annan, og sigandi, Vit hava floytað yvirfyri tykkum, og tit hava ikki dansað; vit hava harmað fyri tykkum, og tit hava ikki grátið.

33 Tí Jóhannes Doyparin kom, hvørki etandi breyð ella drekkandi vín; og tit siga, Hann hevur ein djevul.

34 Menniskjusonurin er komin, etandi og drekkandi; og tit siga, Sí ein átufrekan mann, og ein vínsvølg, ein vin hjá tollarum og syndarum!

35 Men vísdómur*in* er rættvísgjørdur av øllum børnum sínum.

36 ¶ Og ëin av Pharisëarunum tráaði hann, at hann vildi etið hjá sær. Og hann fór inn í hús Pharisëarans, og settist niður til matar.

37 Og sí, ein kvinna í staðinum, sum var ein syndar*inna,* tá ið hon vitsti at *Jesus* sat til matar í húsi Pharisëarans, kom við eini alabastur-krukku av salvu,

38 Og stóð við hansara føtur aftanfyri *hann* grátandi, og tók at tváa hansara føtur við tárum, og turkaði *teir* við høvuðhárum sínum, og kysti hansara føtur, og salvaði *teir* við salvuni.

39 Nú, tá ið Pharisëarin, sum

hevði boðið honum, sá *tað*, talaði hann innan í sær sjálvum, sigandi, Hesin maðurin, um hann var ein prophetur, vildi havt vitað, hvør og hvørsháttar kvinna *henda er*, sum nemur við hann: tí hon er ein syndari.

40 Og Jesus, takandi til orða, segði við hann, Símun, eg havi eitthvørt at siga við teg. Og hann sigur, Meistari, sig áfram.

41 Tað var ein ávísur áognari, sum hevði tveir skuldnarar: tann ēini skyldaði fimm hundrað denarar, og hīn fimti.

42 Og tá ið teir høvdu einkið at gjalda, rætt og slætt fyrigav hann teim báðum. Sig mær tí, hvør av teimum vil elska hann mest?

43 Símun svaraði og segði, Eg rokni við at *hann*, hvørjum hann fyrigav mest. Og hann segði við hann, Tú hevurt rættliga dømt.

44 Og hann vendi *sær* til kvinnuna, og segði við Símun, Sært tú hesa kvinnu? Eg kom inn í hús títt, tú gavst mær einkið vatn til føtur mínar: men hon hevur tváað mínar føtur við tárum, og turkað *teir* við høvuðhárum sínum.

45 Tú gavst mær ongan koss: men henda kvinna, síðan ta tíð eg kom inn, hevur ikki givist at kyssa føtur mínar.

46 Mítt høvur við olju tú salvaðirt ei: men henda kvinna hevur salvað mínar føtur við salvu.

47 Hvørsvegna eg sigi við teg, Hennara syndir, sum eru mangar, eru fyrigivnar; tí hon elskaði mikið: men hvørjum lítið er fyrigivið, *hin sami* elskar lítið.

48 Og hann segði við hana, Tínar syndir eru fyrigivnar.

49 Og teir, sum sótu til matar við honum, tóku at siga innan í sær sjálvum, Hvør er hesin sum fyrigevur syndir eisini?

50 Og hann segði til kvinnuna, Trúgv tín hevur frelst teg; far í friði.

KAPITUL 8

OG tað bar á aftaná, at hann fór út gjøgnum hvønn stað og hvørja bygd, prædikandi og sýnandi glaðu tíðindir kongadømis Guðs: og teir tólv *vóru* við honum,

2 Og ávísar kvinnur, sum vóru vorðnar grøddar frá illum andum og veikleikum, Maria, kallað Măg-dă-lē´-nă, út úr hvørji fóru sjey djevlar;

3 Og Jó-ăn´-nă, kona Chú´-zā, bústjóra Heródesar; og Súsanna; og mangar aðrar, sum tæntu honum av sínum *fíggjar*evnum.

4 ¶ Og tá ið nógv fólk vóru savnaði saman, og vóru komin til hansara út úr hvørjum staði, talaði hann við' eini dømisøgu:

5 Ein sáðmaður fór út at sáa sáð sítt: og sum hann sáaði, fell sumt við vegkantin; og tað varð traðkað niður, og fuglar luftarinnar ótu tað upp.

6 Og sumt fell uppá ein klett; og so skjótt sum tað var sprottið upp, følnaði tað burtur, av tí at tí vantaði vætu.

7 Og sumt fell millum torna; og tornirnir spruttu upp við tí, og køvdu tað.

8 Og annað fell á góða jørð, og spratt upp, og bar ávøkst hundraðfalt. Og tá ið hann hevði sagt hesi ting, rópaði hann, Hann ið oyru hevur at hoyra, lat hann hoyra.

9 Og hansara lærusveinar spurdu hann, sigandi, Hvat mátti henda dømisøga verið?

10 Og hann segði, Tykkum er tað givið at kenna loyndardómar kongadømis Guðs: men fyri øðrum í dømisøgum; at síggjandi tey máttu ikki síggja, og hoyrandi tey máttu ikki skilja.

11 Nú, dømisøgan er hendan: Sáðið er Guðs orð.

12 Tey við vegkantin eru tey

sum hoyra; so kemur djevulin, og tekur burtur orðið út úr hjørtum teirra, at ikki tey skuldu trúgva og verða frelst.

13 Tey á klettinum *eru tey,* sum, tá ið tey hoyra, taka við orðinum við gleði; og hesi hava onga rót, sum í eina stund trúgva, og á freistingartíð falla frá.

14 Og tað sum fell millum torna, eru tey, sum, tá ið tey hava hoyrt, fara út, og verða køvd við sorgum og ríkidømum og njótingum av *hesum* lívi, og bera ongan ávøkst til fullkomningar.

15 Men tað á teirri góðu jørðini eru tey, sum í einum ærligum og góðum hjarta, havandi hoyrt orðið, varðveita *tað,* og bera fram ávøkst við tolmóði.

16 ¶ Eingin maður, tá ið hann hevur kveikt eitt kertaljós, dekkar tað við einum keraldi, ella setur *tað* undir eina song; men setur *tað* í ein kertastaka, at tey, sum koma inn, mega síggja ljósið.

17 Tí at einkið er loynt, sum skal ei verða gjørt eyðsýnt; eiheldur *nakað ting* fjalt, sum skal ei verða kunnugt og koma útumkring.

18 Gevið gætur, tessvegna, hvussu tit hoyra: tí at hvørsumhelst *ið* hevur, til hansara skal verða givið; og hvørsumhelst *ið* hevur ikki, frá honum skal verða tikið enntá tað sum hann tykist at hava.

19 ¶ Tá komu til hansara móðir *hansara* og brøður hansara, og kundu ikki koma at honum fyri troðkanini.

20 Og tað varð sagt honum *av ávísum,* sum søgdu, Móðir tín og brøður tínir standa fyri uttan, tráandi at sjá teg.

21 Og hann svaraði og segði við tey, Móðir mín og brøður mínir eru hesi, sum hoyra Guðs orð, og gera tað.

22 ¶ Nú, tað hendi á einum ávísum degi, at hann fór inn í ein bát við lærusveinum sínum: og hann segði við teir, Latum okkum fara yvirum hīnumegin vatnið. Og teir løgdu út.

23 Men sum teir sigldu, sovnaði hann: og tað kom niður ein stormur av vindi á vatnið; og teir vórðu fyltir *við vatni,* og vóru í vanda.

24 Og teir komu til hansara, og vaktu hann, sigandi, Meistari, meistari, vit glatast. Tá reistist hann, og hartaði vindin og bralan vatnsins: og tey steðgaðu, og har varð stilli.

25 Og hann segði við teir, Hvar er trúgv tykkara? Og teir, verandi ræddir, undraðust, sigandi hvør við annan, Hvørsháttar maður er hesin! tí hann býður enntá vindunum og vatni, og tey lýða hann.

26 ¶ Og teir komu fram í landinum hjá Găd-ă-rēn´-unum, sum er yvir av Galilēu.

27 Og tá ið hann fór fram á land, møtti honum út úr staðinum ein ávísur maður, sum hevði djevlar langa tíð, og var í ongum klæðum, eiheldur varð *støðugur* í *nøkrum* húsi, men í grøvunum.

28 Tá ið hann sá Jesus, rópti hann út, og fell niður frammi fyri honum, og við harðari rødd segði, Hvat havi eg at gera við teg, Jesus, *tú* Sonur Guðs mest høga? Eg bøni teg, pínsla meg ikki.

29 (Tí at hann hevði boðið tí óreina andanum at koma út úr manninum. Tí at mangan hevði hann fangað hann: og hann varð hildin bundin við ketum og í *fót*leinkjum; og hann breyt bondini, og varð drivin av djevlinum inn í oyðuna.)

30 Og Jesus spurdi hann, sigandi, Hvat er navn títt? Og hann segði, Legión: tí at mangir djevlar vóru farnir inn í hann.

31 Og teir bønaðu hann, at hann vildi ikki bjóða teimum at fara út inní djúpið.

32 Og tað var har eitt fylgi av mongum svínum á biti á fjallinum: og teir bønaðu hann, at hann vildi loyvt teimum at farið inn í tey. Og hann loyvdi teimum.

33 Tá fóru djevlarnir út úr manninum, og fóru inn í svínini: og fylgið rann harðligani omaneftir einum brøttum plássi inn í vatnið, og vórðu kódnaði.

34 Tá ið teir, sum føddu *tey,* sóu hvat var gjørt, flýddu teir, og fóru og søgdu *frá ti* í staðinum og á landinum.

35 Tá fóru tey út at sjá hvat var gjørt; og komu til Jesu, og funnu mannin, út úr hvørjum djevlarnir vóru farnir avstað, sitandi við Jesu føtur, klæddan, og í sínum rætta sinni: og tey vórðu rædd.

36 Teir eisini, sum sóu *tað,* søgdu teimum, viðˆ hvørjum brøgdum hann, sum var heltikin við djevlunum, varð grøddur.

37 ¶ Øll mannfjøldin úr landinum hjá Gădˊă-rēnˊ-unum runt um tá bønaði hann at fara avstað frá teimum; tí at tey vóru tikin við miklum ótta: og hann fór upp í bátin, og vendi aftur aftur.

38 Nú maðurin, út úr hvørjum djevlarnir vóru farnir avstað, bønaði hann, at hann mátti verðið hjá honum: men Jesus sendi hann avstað, sigandi,

39 Vend aftur til egna húss tíns, og sýn hvussu miklar lutir Guð hevur gjørt tær. Og hann fór sín veg, og kunngjørdi út um allan staðin, hvussu miklar lutir Jesus hevði gjørt honum.

40 Og tað bar á, at tá ið Jesus var komin aftur, tók fólkið ímóti honum *gleðiliga:* tí at tey biðaðu øll eftir honum.

41 ¶ Og sí, har kom ein maður, nevndur Já-ĭ-rūs, og hann var ein stjórnari av sýnagoguni: og hann fell niður við Jesu føtur, og bønaði hann, at hann vildi komið inn í hús sítt:

42 Tí hann hevði ēina ēinastu dóttur, umleið tólv ár til aldurs, og hon lá at doyggja. Men sum hann fór, trongdi fólkið hann.

43 ¶ Og ein kvinna, havandi blóðsótt tólv ár, sum hevði oytt alt sítt livibreyð uppá læknar, eiheldur kundi verða grødd av nøkrum,

44 Kom aftanfyri *hann,* og nam við faldin á hansara klæði: og í stundini steðgaði hennara blóðgangur.

45 Og Jesus segði, Hvør nam við meg? Tá ið øll noktaðu, søgdu Pætur og teir sum við honum vóru, Meistari, mannfjøldin treingir teg og trýstir *teg,* og sigurt tú, Hvør nam við meg?

46 Og Jesus segði, Onkur hevur nomið við meg: tí at eg varnist, at magn er farið út úr mær.

47 Og tá ið kvinnan sá, at hon var ikki fjald, kom hon piprandi, og, fallandi niður frammanfyri honum, upplýsti hon honum frammi fyri øllum fólkinum, fyri hvørja grund hon hevði nomið við hann, og hvussu hon varð grødd í stundini.

48 Og hann segði við hana, Dóttir, ver við góða uggan: trúgv tín hevur gjørt teg heila; far í friði.

49 ¶ Meðan hann enn talaði, kemur ēin frá *húsinum* hjá stjórnaranum av sýnagoguni, sigandi við hann, Dóttir tín er deyð; ónáða ikki Meistaran.

50 Men tá ið Jesus hoyrdi *tað,* svaraði hann honum, sigandi, Óttast ikki: trúgv einans, og hon skal verða gjørd heil.

51 Og tá ið hann kom inn í húsið, loyvdi hann ongum manni at fara inn, uttan Pæturi, og Jákobi, og Jóhannesi, og faðirinum og móðrini at gentuni.

52 Og øll grótu, og syrgdu hana: men hann segði, Grátið ikki; hon er ikki deyð, men svevur.

53 Og tey læðu hann í háð, vitandi, at hon var deyð.

54 Og hann sendi tey øll út, og tók í hondina á henni, og kallaði, sigandi, Genta, reis *teg*.
55 Og hennara andi kom aftur, og hon reistist beinanvegin: og hann beyð at geva henni mat.
56 Og foreldur hennara vórðu ovfarin: men hann álegði teimum, at tey skuldu ongum manni siga hvat var gjørt.

KAPITUL 9

TÁ kallaði hann sínar tólv lærusveinar saman, og gav teim mátt og myndugleika yvir øllum djevlum, og at lekja sjúkdómar.
2 Og hann sendi teir at prædika kongadømi Guðs, og at grøða tey sjúku.
3 Og hann segði við teir, Takið einkið til ferð *tykkara,* hvørki stavar, eiheldur pjøka, eiheldur breyð, eiheldur pening; eiheldur havið tveir kyrtlar stykkið.
4 Og hvatsumhelst hús tit fara inn í, har verðið, og haðani farið avstað.
5 Og hvørsumhelst *ið* vil ikki taka ímóti tykkum, tá ið tit fara úr tí staði, ristið av sjálvt dustið frá tykkara fótum til ein vitnisburð ímóti teimum.
6 Og teir fóru avstað, og fóru ígjøgnum býirnar, prædikandi gleðiboðskapin, og grøðandi allastaðni.
7 ¶ Nú, fjórðingsfúrstin Heródes hoyrdi um alt *tað* sum varð gjørt av honum: og hann var ørkymlaður, av tí at tað varð sagt av summum, at Jóhannes var risin frá teimum deyðu;
8 Og av summum, at Ĕ-lī´-ăs hevði birtst; og av øðrum, at ēin av teimum gomlu prophetunum var risin aftur.
9 Og Heródes segði, Jóhannes havi eg hálshøgt: men hvør er hesin, um hvønn eg hoyri slíkar lutir? Og hann tráaði at sjá hann.
10 ¶ Og ápostlarnir, tá ið teir vóru komnir aftur, søgdu honum alt sum teir høvdu gjørt. Og hann tók teir, og fór til viks ēinsærisligani inn á eitt oyðistað, tilhoyrandi staðinum, kallaðum Bĕth-să´-ī-dŭ.
11 Og fólkið, tá ið tey vitstu *tað,* fylgdu honum: og hann tók ímóti teimum, og talaði fyri teimum um kongadømi Guðs, og grøddi tey sum høvdu tørv á grøðing.
12 Og tá ið dagurin tók at svinna burtur, tá komu teir tólv, og søgdu við hann, Send mannamúgvuna avstað, at tey mega fara inn í býirnar og landið runt umkring, og gista, og fáa vistir: tí at vit eru her á einum oyðistaði.
13 Men hann segði við teir, Gevið tit teimum at eta. Og teir søgdu, Vit hava ikki meira enn fimm breyð og tveir fiskar; uttan vit skuldu farið og keypt mat til alt hetta fólkið.
14 Tí at teir vóru umleið fimm túsund menn. Og hann segði til lærusveina sína, Fáið tey at setast niður við fimtium í flokki.
15 Og teir so gjørdu, og fingu tey øll at setast niður.
16 Tá tók hann tey fimm breyðini og teir báðar fiskarnar, og, lítandi upp til himins, vælsignaði hann tey, og breyt, og gav til lærusveina sína at seta frammanfyri mannfjøldini.
17 Og tey ótu, og vórðu øll mettaði: og tað varð tikið upp av molum, sum vóru eftir hjá teimum, tólv tægur.
18 ¶ Og tað bar á, sum hann var einsamallur biðjandi, hjá honum vóru lærusveinar hansara: og hann spurdi teir, sigandi, Hvønn sigur fólkið at eg eri?
19 Svarandi søgdu teir, Jóhannes Doyparin; men summi *siga,* Ĕ-lī´-ăs; og onnur *siga,* at ēin av teimum gomlu prophetunum er risin aftur.
20 Hann segði við teir, Men

hvønn siga tit at eg eri? Svarandi segði Pætur, Christus˜ Guðs.

21 Og strangligani álegði hann teimum, og ábeyð *teimum* at siga ongum manni handa lut;

22 Sigandi, Menniskjusonurin má líða mong ting, og verða vrakaður av teimum elstu og fremstu prestunum og *hinum* skriftlærdu, og verða vigin, og verða reistur hin triðja dagin.

23 ¶ Og hann segði til *teirra* alra, Um nakar *maður* vilji koma aftaná mær, lat hann avnokta sjálvan seg, og taka upp kross sín dagligani, og fylgja mær.

24 Tí at hvørsumhelst *ið* vil frelsa sítt lív, skal missa tað: men hvørsumhelst *ið* vil missa sítt lív fyri mína skyld, hin sami skal frelsa tað.

25 Tí at hvat verður ein maður fyrimunaður, um hann vinni hin heila heim, og missi sjálvan seg, ella verði kastaður burtur?

26 Tí at hvørsumhelst *ið* skal skammast við meg og við orðini hjá mær, við hann skal Menniskjusonurin skammast, tá ið hann skal koma í síni egnu dýrd, og *í* Faðirs *síns,* og hinna heilagu eingla.

27 Men eg sigi tykkum av sonnum, tað veri summir sum standa her, sum skulu ikki smakka av deyða, til teir síggja kongadømi Guðs.

28 ¶ Og tað bar á umleið einar átta dagar eftir hesar framsagnir, tók hann Pætur og Jóhannes og Jákob, og fór niðan á eitt fjall at biðja.

29 Og sum hann bað, varð sniðið á hans ásjón umbroytt, og hansara klædnaður *varð* hvítur *og* glampandi.

30 Og sí, tað talaðu við hann tveir menn, sum vóru Móses og Ē-lī´-ās:

31 Sum birtust í dýrd, og talaðu um hansara burturferð, sum hann skuldi fullføra í Jerusalem.

32 Men Pætur, og teir sum við honum vóru, vóru tungir við svøvni: og tá ið teir vóru vaknaðir, sóu teir hansara dýrd, og teir báðar menninar sum stóðu hjá honum.

33 Og tað bar á, sum teir fóru avstað frá honum, segði Pætur við Jesus, Meistari, tað er gott hjá okkum at vera her: og latum okkum gera trý tabernakkul; ēitt til tín, og ēitt til Mósesar, og ēitt til Ē-lī´-ās-ar: ei vitandi hvat hann segði.

34 Meðan hann soleiðis talaði, kom tað eitt skýggj, og skuggaði yvir teir: og teir óttaðust, sum teir fóru inn í skýggið.

35 Og tað kom ein rødd út úr skýgginum, sigandi, Hesin er mín háttelskaði Sonur: hoyrið hann.

36 Og tá ið røddin var umliðin, varð Jesus funnin einsamallur. Og teir hildu *tað* loynt, og søgdu í teimum døgum ongum manni nøkur av teimum tingunum sum teir høvdu sæð.

37 ¶ Og tað bar á, at á tí næsta deginum, tá ið teir vóru komnir oman av fjallinum, møtti honum mikið fólk.

38 Og sí, ein maður úr samlaginum rópti út, sigandi, Meistari, eg bøni teg, hygg uppá son mín: tí hann er mítt ēinasta barn.

39 Og sí, ein andi tekur hann, og alt í einum geylar hann út; og hann skræðir *í* hann, at hann froðar aftur; og, løstandi hann, valla fer frá honum.

40 Og eg bønaði lærusveinar tínar at kasta hann út; og teir kundu ikki.

41 Og svarandi segði Jesus, O vantrúna og spilta ætt, hvussu leingi skal eg vera hjá tykkum, og tola tykkum? Før son tín higar.

42 Og, sum hann var enn komandi, kastaði djevulin hann niður, og skræddi *í hann.* Og Jesus hartaði hin óreina andan, og grøddi barnið, og flýggjaði hann aftur til faðir hansara.

43 ¶ Og tey vórðu øll ovfarin yvir hina mektigu kraft Guðs. Men meðan tey undraðust hvør *og* ein á øll ting sum Jesus gjørdi, segði hann við lærusveinar sínar,
44 Latið hesar framsagnir søkka niður í oyru tykkara: tí at Menniskjusonurin skal verða givin upp í mannahendur.
45 Men teir skiltu ikki hesa framsøgnina, og hon var fjald fyri teimum, at teir fataðu hana ikki: og teir óttaðust at spyrja hann um ta framsøgnina.
46 ¶ Tá reis tað eitt orðaskifti teirra millum, hvør teirra mundi vera størstur.
47 Og Jesus, verðandi varugur við teirra hjartans hugsan, tók eitt barn, og setti hann hjá sær,
48 Og segði við teir, Hvørsumhelst *ið* skal taka ímóti hesum barni í navni mínum, tekur ímóti mær: og hvørsumhelst *ið* skal taka ímóti mær, tekur ímóti honum sum sendi meg: tí at hann, sum er minstur millum tykkar alra, hin sami skal vera mikil.
49 ¶ Og Jóhannes tók til orða og segði, Meistari, vit sóu ein, kastandi út djevlar í navni tínum; og vit sýttu honum, av tí at hann fylgist ikki við okkum.
50 Og Jesus segði við hann, Sýtið *honum* ikki: tí at hann, sum er ikki ímóti okkum, er fyri okkum.
51 ¶ Og tað bar á, tá ið tíðin var komin at hann skuldi verða móttikin upp, setti hann støðufastligani sítt andlit til at fara til Jerusalem,
52 Og sendi sendiboð undan sínum andliti: og teir fóru, og komu inn í eina bygd hjá Sămărĭ-tān′-arunum, at gera tilreiðar fyri honum.
53 Og teir tóku ikki ímóti honum, av tí at hans andlit var sum um hann vildi fara til Jerusalem.
54 Og tá ið hansara lærusveinar, Jákob og Jóhannes, sóu *tað,* søgdu teir, Harri, vilt tú at vit skipa eldi at koma niður frá himni, og upptæra teir, enntá sum Ē-lĭ′-ás gjørdi?
55 Men hann vendi *sær,* og hartaði teir, og segði, Tit vita ikki hvørsháttar anda tit eru av.
56 Tí at Menniskjusonurin er ikki komin at oyða mannalív, men at frelsa *tey.* Og teir fóru til eina aðra bygd.
57 ¶ Og tað bar á, at sum teir ferðaðust á veginum, segði ein ávísur *maður* við hann, Harri, eg vil fylgja tær hvagarsumhelst tú fert.
58 Og Jesus segði við hann, Revar hava holur, og luftarinnar fuglar *hava* reiður; men Menniskjusonurin hevur ikki hvar at leggja *sítt* høvur.
59 Og hann segði við ein annan, Fylg mær. Men hann segði, Harri, loyv mær fyrst at fara og jarða faðir mín.
60 Jesus segði við hann, Lat hinar deyðu jarða sínar deyðu: men far tú og prædika kongadømi Guðs.
61 Og eisini ein annar segði, Harri, eg vil fylgja tær; men fyrst lat meg fara at bjóða teimum farvæl, sum eru heima í húsi mínum.
62 Og Jesus segði við hann, Eingin maður, havandi lagt sína hond á plógvið, og hyggjandi tilbakar, er egnaður til kongadømis Guðs.

KAPITUL 10

EFTIR hesi tingini útnevndi Harrin aðrar sjeyti eisini, og sendi teir tveir og tveir undan sínum andliti inn í hvønn stað og *hvørt* pláss, hvagar sjálvur hann vildi koma.
2 Tessvegna segði hann við teir, Heystið sanniliga *er* mikið, men arbeiðsmenninir *eru* fáir: biðjið tit tessvegna Harra heystsins, at hann vildi sent fram arbeiðsmenn inn í heyst sítt.
3 Farið tykkara vegir: sí, eg

sendi tykkum fram eins og lomb millum úlva.

4 Berið hvørki pung, ella pjøka, ella skógvar: og heilsið ongum manni eftir veginum.

5 Og inn í hvatsumhelst hús tit fara, sigið fyrst, Friður *veri* til hetta hús.

6 Og um friðarsonurin veri har, skal friður tykkara hvíla uppiá tí: um ikki, skal hann venda til tykkara aftur.

7 Og í tí sama húsinum verðið verandi, etandi og drekkandi slík ting sum tey geva: tí at arbeiðsmaðurin er hýru sína verdigur. Farið ikki frá húsi til húss.

8 Og inn í hvønnsumhelst stað tit fara, og tey taka ímóti tykkum, etið slík ting sum verða sett framfyri tykkum:

9 Og grøðið tey sjúku sum eru harí, og sigið við tey, Kongadømi Guðs er komið nær at tykkum.

10 Men inn í hvønnsumhelst stað tit fara, og tey taka ikki ímóti tykkum, farið tykkara vegir út á gøturnar av hinum sama, og sigið,

11 Enntá sjálvt dustið av tykkara staði, sum loðar á okkum, busta vit av ímóti tykkum: hóast hetta, verið tit vísir um hetta, at kongadømi Guðs er komið nær tykkum.

12 Men eg sigi tykkum, at tað skal vera meiri úthaldiligt á hínum degi hjá Sodomu, enn hjá tí staði.

13 Vei tær, Chŏ́-rà-zīn! vei tær, Bĕth-sā́-ī-dŭ! tí at um tey mektigu verkini høvdu verðið gjørd í Týrus og Sī́-dŏn, sum hava verðið gjørd í tykkum, *tá* høvdu tey *fyri* langari tíð síðani vent um, sitandi í sekkjaklæði og øskum.

14 Men tað skal verða meiri úthaldiligt hjá Týrus og Sī́-dŏn í dóminum, enn hjá tykkum.

15 Og tú, Că-pĕŕ-nă-ŭm, sum ert hevjað upp til himins, skalt verða stoytt niður til helvitis.

16 Hann, sum hoyrir tykkum, hoyrir meg; og hann, sum vanvirðir tykkum, vanvirðir meg; og hann, sum vanvirðir meg, vanvirðir hann sum sendi meg.

17 ¶ Og teir sjeyti komu aftur við frøi, sigandi, Harri, sjálvt djevlarnir eru undirbrotligir yvirfyri okkum gjøgnum navn títt.

18 Og hann segði við teir, Eg skoðaði Satan sum snarljós falla frá himni.

19 Sí, eg gevi tykkum mátt til at traðka á høggormar og sporðdrekar, og yvir øllum mátti figgindans: og einkið skal viðˆ nøkrum midlum meina tykkum.

20 Hóast hetta, í hesum fegnist ikki, at andarnir eru undirbrotligir yvirfyri tykkum; men heldur fegnist, av tí at tykkara nøvn eru *upp*skrivað í himni.

21 ¶ Í tí tíma fegnaðist Jesus í anda, og segði, Eg takki tær, O Faðir, Harra himins og jarðar, at tú hevurt fjalt hesi ting fyri hinum vísu og vitru, og hevurt opinberað bróstabørnum tey: enntá so, Faðir; tí at soleiðis tóktist tað gott í eygsjón tíni.

22 Øll ting eru fingin mær av Faðir mínum: og eingin maður veit, hvør Sonurin er, uttan Faðirin; og hvør Faðirin er, uttan Sonurin, og *hann,* fyri hvørjum Sonurin vil opinbera *hann.*

23 ¶ Og hann vendi sær at *sínum* lærusveinum, og segði ēinsærisliga, Vælsignaði *eru* tey eygu sum síggja tey tingini sum tit síggja:

24 Tí at eg sigi tykkum, at mangir prophetar og kongar hava tráað at síggja tey tingini sum tit síggja, og hava ikki sæð *tey;* og at hoyra tey tingini sum tit hoyra, og hava ikki hoyrt *tey.*

25 ¶ Og sí, ein ávísur lógkønur stóð upp, og freistaði hann, sigandi, Meistari, hvat skal eg gera *fyri* at arva ævigt lív?

26 Hann segði við hann, Hvat stendur skrivað í lógini? hvussu lesurt tú?

27 Og svarandi segði hann, Tú skalt elska Harran Guð tín við øllum hjarta tínum, og við allari sál tíni, og við allari styrki tíni, og við øllum huga tínum; og næsta tín sum sjálvan teg.

28 Og hann segði við hann, Tú hevurt svarað rætt: hetta ger, og tú skalt liva.

29 Men hann, viljugur at rættvísgera seg sjálvan, segði við Jesus, Og hvør er næsti mín?

30 Og svarandi segði Jesus, Ein ávísur *maður* fór oman frá Jerusalem til Jericho, og fell millum ránsmanna, sum berkaðu hann fyri hansara klædnað, og særdu *hann,* og fóru avstað, eftirlatandi *hann* hálvdeyðan.

31 Og av tilvild kom tað oman ein ávísur prestur tann vegin: og tá hann sá hann, fór hann framvið hīnumegin.

32 Og somuleiðis ein Levitur, tá ið hann var á staðnum, kom og hugdi *á hann,* og fór framvið hīnumegin.

33 Men ein ávísur Sǎ-măr-ī-tān´ari, sum hann ferðaðist, kom har *ið* hann var: og tá hann sá hann, hevði hann várkunn *á hann,*

34 Og fór til *hansara,* og bant um hansara sár, hellandi olju og vín í, og setti hann á sítt egna djór, og førdi hann til eitt gistihús, og tók sær av honum.

35 Og um morgunin, tá ið hann fór avstað, tók hann upp tveir denarar, og gav *teir* til vertin, og segði við hann, Tak tær av honum; og hvatsumhelst tú brúkart meira, tá ið eg komi aftur, vil eg endurgjalda tær.

36 Hvør nú av hesum trimum, heldurt tú, var næsti at honum sum fell millum ránsmannanna?

37 Og hann segði, Hann sum sýndi miskunn á hann. Tá segði Jesus við hann, Far, og ger tú somuleiðis.

38 ¶ Nú, tað bar á, sum teir ferðaðust, at hann fór inn í eina ávísa bygd: og ein ávís kvinna, nevnd Martha, tók ímóti honum inn í hús sítt.

39 Og hon hevði eina systur, nevnd Maria, sum eisini settist við Jesu føtur, og hoyrdi orð hansara.

40 Men Martha var ampað um nógva tæning, og kom til hansara, og segði, Harri, leggurt tú ikki í, at systir mín hevur eftirlatið meg at tæna einsamalla? skipa henni tí, at hon hjálpi mær.

41 Og Jesus svaraði og segði við hana, Martha, Martha, tú ert sútfull og órógvað um mong ting:

42 Men ēitt ting er neyðugt: og Maria hevur valt tann góða partin, sum skal ikki verða tikin burtur frá henni.

KAPITUL 11

OG tað bar á, sum hann bað á einum ávísum staði, tá ið hann gavst, at ēin av lærusveinum hansara segði við hann, Harri, lær okkum at biðja, eins og Jóhannes eisini lærdi lærusveinar sínar.

2 Og hann segði við teir, Tá ið tit biðja, sigið, Faðir vár sum ert í himni, Halgað veri navn títt. Komi kongadømi títt. Veri gjørdur vilji tín, sum í himni, so á jørð.

3 Gev okkum dag um dag okkara dagliga breyð.

4 Og fyrigev okkum syndir okkara; tí at vit eisini fyrigeva hvørjum tí, sum er skyldigur móti okkum. Og leið okkum ikki inn í freisting; men bjarga okkum frá illum.

5 Og hann segði við teir, Hvør av tykkum skal hava ein vin, og skal fara til hansara á midnátt, og siga við hann, Vinur, læn mær trý breyð;

6 Tí ein vinur mín á síni ferð er komin til mín, og eg havi einkið at seta frammanfyri honum?

7 Og hann innanífrá skal svara og siga, Órógva meg ikki: hurðin

er nú lokað, og míni børn eru hjá mær í song; eg kann ikki rísa og geva tær.

8 Eg sigi tykkum, Hóast hann vil ikki rísa og geva honum, av tí at hann er vinur hansara, tó uppá grund av hansara nærgangni vil hann rísa og geva honum so mong sum honum tarvast.

9 Og eg sigi tykkum, Umbiðjið, og tað skal verða givið tykkum; søkið, og tit skulu finna; bankið, og tað skal verða latið upp yvirfyri tykkum.

10 Tí at hvør tann, ið umbiður, fær; og hann, ið søkir, finnur; og fyri honum, sum bankar, skal tað verða latið upp.

11 Um ein sonur skal umbiðja breyð frá onkrum av tykkum sum er ein faðir, vil hann geva honum ein stein? ella um *hann umbiðji* ein fisk, vil hann fyri ein fisk geva honum ein høggorm?

12 Ella um hann skal umbiðja eitt egg, vil hann bjóða honum ein sporðdreka?

13 Um tá tit, verandi óndir, vita hvussu geva *eigur* børnum tykkara góðar gávur: hvør mikið meira skal *tykkara* himinski Faðir geva Heilaga Andan til teirra sum umbiðja hann?

14 ¶ Og hann var kastandi út ein djevul, og hann var málleysur. Og tað bar á, tá ið djevulin var farin út, talaði tann málleysi; og fólkið undraðist.

15 Men summi av teimum søgdu, Hann kastar út djevlar gjøgnum Bē-ĕl′-zĕ-bŭb, hin ovasta djevlanna.

16 Og onnur, freistandi *hann,* søktu av honum eitt tekin frá himni.

17 Men hann, skynandi teirra hugsanir, segði við tey, Hvørt kongadømi, sundurbýtt ímóti sær sjálvum, verður ført til oyðingar; og eitt hús, *sundurbýtt* ímóti einum húsi, fellur.

18 Um Satan eisini veri sundurbýttur ímóti sær sjálvum, hvussu skal kongadømi hansara standast? av tí at tit siga, at eg kasti út djevlar gjøgnum Bē-ĕl′-zĕ-bŭb.

19 Og um eg viðˆ Bē-ĕl′-zĕ-bŭb kasti út djevlar, viðˆ hvørjum kasta synir tykkara *teir* út? tí skulu teir vera dómarar tykkara.

20 Men um eg við Guðs fingri kasti út djevlar, ivaleyst er kongadømi Guðs komið uppá tykkum.

21 Tá ið ein sterkur maður vápnaður varðar sína borg, er hansara góðs í friði:

22 Men tá ið ein sterkari enn hann skal koma uppá hann, og yvirvinna hann, tekur hann frá honum allan hans herbúnað, hvará hann leit, og skiftir *sundur* hansara herfeingir.

23 Hann, ið er ikki við mær, er ímóti mær: og hann, ið savnar ikki við mær, spjaðir.

24 Tá ið hin óreini andin er farin út úr einum manni, gongur hann gjøgnum turr støð, søkjandi hvílu; og, finnandi onga, sigur hann, Eg vil venda aftur inn í hús mítt, hvaðan eg kom út.

25 Og tá ið hann kemur, finnur hann *tað* sópað og prýtt.

26 Tá fer hann, og tekur *at sær* sjey aðrar andar, meiri vondir enn sjálvur hann; og teir fara inn, og búgva har: og hin síðsti *standurin* hjá tí manninum er verri enn hin fyrsti.

27 ¶ Og tað bar á, sum hann talaði hesi ting, ein ávís kvinna av flokkinum lyfti upp sína rødd, og segði við hann, Vælsignað *er* tað móðurlív sum teg bar, og tey brást sum tú hevurt sogið.

28 Men hann segði, Ja heldur, vælsignað *eru* tey sum hoyra Guðs orð, og varðveita tað.

29 ¶ Og tá ið fólkið var savnað tjúkt saman, fór hann undir at siga, Hetta er ein ónd ætt: tey søkja eitt tekin, og tað skal einkið

tekin verða givið henni, uttan tekin Jónasar prophets.

30 Tí at eins og Jónas var Nīn-ĕ-vīt´-unum eitt tekin, soleiðis skal eisini Menniskjusonurin vera fyri hesi ætt.

31 Drotningin úr suðri skal rísa upp í dóminum við monnunum av hesi ætt, og fordøma teir: tí at hon kom frá ytstu pørtum jarðarinnar at hoyra vísdóm Sálomons; og sí, ein størri enn Sálomon *er* her.

32 Menninir úr Nīn´-ē-vē skulu rísa upp í dóminum við hesi ætt, og skulu fordøma hana: tí at teir vendu um við prædikan Jónasar; og sí, ein størri enn Jónas *er* her.

33 Eingin maður, tá ið hann hevur kveikt eitt kertaljós, setur *tað* í eitt loynistað, eiheldur undir eitt skeppumál, men á ein kertastaka, at tey, sum koma inn, mega síggja ljósið.

34 Eygað er ljós likamsins: tessvegna, tá ið títt eyga er ēinfalt, er alt likam títt eisini fult av ljósi; men tá ið *títt eyga* er ónt, *er* likam títt eisini fult av myrkri.

35 Gev gætur *eftir,* tessvegna, at ljósið, sum tær er í, veri ikki myrkur.

36 Um alt likam títt, tessvegna, *veri seg* fult av ljósi, havandi ongan part myrkan, skal tað heila vera fult av ljósi, sum tá ið tað bjarta skinið av einum kertaljósi gevur tær ljós.

37 ¶ Og sum hann talaði, bønaði ein ávísur Pharisēari hann at eta *døgverða* hjá sær: og hann fór inn, og settist niður til matar.

38 Og tá ið Pharisēarin sá *tað,* undraðist hann *á,* at hann hevði ikki fyrst tváað *sær* undan máltíðini.

39 Og Harrin segði við hann, Nú gera tit Pharisēarar bikarið og fatið reint uttan; men tykkara innvortis partur er fullur av ránfýsni og illskapi.

40 *Tykkara* dárar, gjørdi ikki hann, sum gjørdi tað sum er uttaná, eisini tað sum er innaní?

41 Men heldur gevið olmussur av slíkum tingum sum tit hava; og sí, øll ting eru rein hjá tykkum.

42 Men vei tykkum, Pharisēarum! tí at tit tíggjunda myntu og rútu og alskyns urtir, og loypa um dóm og kærleika Guðs: hesi áttu tit at hava gjørt, og ikki at latið hitt ógjørt.

43 Vei tykkum, Pharisēarum! tí at tit elska teir ovastu sessirnar í sýnagogunum, og heilsanir á torgunum.

44 Vei tykkum, skriftlærdum og Pharisēarum, hyklarum! tí at tit eru eins og gravir sum sýnast ikki, og menninir, sum ganga yvir *tær,* eru ikki varir *við tær.*

45 ¶ Tá tók ēin av teimum lógkønu til orða, og segði við hann, Meistari, svá sigandi vanærirt tú okkum við.

46 Og hann segði, Vei tykkum við, *tit* lógkønu! tí at tit løða menn við byrðum, svárligar at verða bornar, og tit sjálvir nerta ikki byrðarnar við ēinum av fingrum tykkara.

47 Vei tykkum! tí at tit byggja gravhýsini hjá prophetunum, og tykkara fedrar drópu teir.

48 Sanniliga bera tit vitnisburð, at tit viðurkenna gerðirnar hjá tykkara fedrum: tí at teir víst drópu teir, og tit byggja teirra gravhýsir.

49 Tessvegna eisini segði Guðs vísdómur, Eg vil senda teimum prophetar og ápostlar, og *summum* av teimum skulu teir bana og søkja at:

50 At blóðið av øllum prophetunum, sum varð úthelt frá grundlegging veraldarinnar, má verða kravt av hesi ætt;

51 Frá blóði Ábels til blóð Zăch-ă-rī´-ăs-ar, sum fórst ímillum altarið og templið: sanniliga sigi eg tykkum, Tað skal verða kravt av hesi ætt.

52 Vei tykkum, lógkønum! tí at tit hava tikið burtur lykil kunnleikans: tit fóru ikki inn sjálvir, og teimum, ið vóru farandi inn, forðaðu tit.

53 Og sum hann segði hesi ting við teir, byrjaðu hinir skriftlærdu og Pharisēararnir at noyða *hann* ógvusliga, og at eggja honum til at tala um mong ting:

54 Liggjandi *á* lúri eftir honum, og søkjandi at fanga eitthvørt út úr munni hansara, at teir máttu ákært hann.

KAPITUL 12

Í MILLUMTÍÐINI, tá ið tað var savnað saman ein óteljilig fjøld av fólki, so mikið at tey tróðu hvørt uppá annað, fór hann undir at siga við sínar lærusveinar fyrst av øllum, Verið tit varnir fyri súrdeiggi Pharisēaranna, sum er hyklarí.

2 Tí at einkið er hult, sum skal ei verða opinberað; eiheldur fjalt, sum skal ei verða kunnugt.

3 Tessvegna, hvatsumhelst *ið* tit hava talað í myrkri, skal verða hoyrt í ljósinum; og tað, sum tit hava talað í oyrað í kømrum, skal verða kunngjørt uppiá tekjunum.

4 Og eg sigi við tykkum, vinir mínir, Verið ikki ræddir fyri teimum sum drepa likamið, og eftir tað hava einkið meira sum teir kunnu gera.

5 Men eg vil fyrifram ávara tykkum hvønn tit skulu óttast: Óttist hann, sum eftir *at* hann hevur dripið, hevur vald at kasta inn í helviti; ja, eg sigi tykkum, Óttist hann.

6 Verða ikki fimm spurvar seldir fyri tveir skillingar, og ikki ēin av teimum er gloymdur frammi fyri Guði?

7 Men enntá sjálv hárini á tykkara høvdi eru øll upptøld. Óttist ikki, tessvegna: tit eru av meiri virði enn mangir spurvar.

8 Eisini sigi eg tykkum, Hvørsumhelst *ið* skal játta meg frammi fyri monnum, hann skal Menniskjusonurin eisini játta frammi fyri einglum Guðs:

9 Men hann, sum avnoktar meg frammi fyri monnum, skal verða avnoktaður frammi fyri einglum Guðs.

10 Og hvørsumhelst *ið* skal tala eitt orð ímóti Menniskjusyninum, tað skal verða fyrigivið honum: men honum, sum Guðsspottar ímóti Halga Andanum, skal tað ikki verða fyrigivið.

11 Og tá ið teir føra tykkum at sýnagogunum, og *at* veldismonnum, og valdum, stúrið tit ikki fyri hvussu ella hvat ting tit skulu svara, ella hvat tit skulu siga:

12 Tí at Halgi Andin skal læra tykkum í tí sama tíma, hvat tit áttu at siga.

13 ¶ Og ēin úr samlaginum segði við hann, Meistari, tala til bróður míns, at hann skifti arvin við meg.

14 Og hann segði við hann, Maður, hvør gjørdi meg *til* ein dómara ella ein skiftingarmann yvir tykkum?

15 Og hann segði við tey, Ansið eftir, og verið varin fyri havisjúku: tí at lívið hjá einum manni er ikki samansett av ríkiligsemini av teimum tingunum sum hann eigur.

16 Og hann talaði eina dømisøgu til teirra, sigandi, Jørðin hjá einum ávísum ríkum manni gav av sær ríkiligani:

17 Og hann hugsaði innan í sær sjálvum, sigandi, Hvat skal eg gera, tí at eg havi einkið rúm, hvar til at goyma mín ávøkst?

18 Og hann segði, Hetta vil eg gera: eg vil ríva niður mínar løður, og byggja størri; og har vil eg goyma allar mínar ávøkstir og góðs mítt.

19 Og eg vil siga til sál mína,

Sál, tú hevurt mikið góðs lagt niðurfyri til mong ár; tak tær av løttum, et, drekk, *og* ver glað.

20 Men Guð segði við hann, *Tín* dári, hesa nátt skal tín sál verða kravd av tær: hvørs skulu tá hasi tingini vera, sum tú hevurt útvegað?

21 Soleiðis *er* hann sum leggur niðurfyri dýrgripir til sín sjálvs, og er ikki ríkur mótvegis Guði.

22 ¶ Og hann segði við lærusveinar sínar, Tí sigi eg tykkum, Stúrið ikki fyri lívi tykkara, hvat tit skulu eta; eiheldur fyri likaminum, hvat tit skulu fara í.

23 Lívið er meiri enn matur, og likamið *er meiri* enn klædnaður.

24 Umhugsið ravnarnar: tí at teir hvørki sáa ella heysta; sum eiheldur hava hjall ella løðu; og Guð føðir teir: hvør mikið meira eru tit mætari enn fuglarnir?

25 Og hvør av tykkum, við at stúra, kann leggja ĕina alin afturat hædd síni?

26 Um tit tá veri ikki mentir at gera tað sum er minst, hví stúra tit fyri restini?

27 Umhugsið liljurnar, hvussu tær vaksa: tær strevast ikki, tær spinna ikki; og tó sigi eg tykkum, at Sálomon í allari síni dýrd var ikki skrýddur sum ĕin av hesum.

28 Um tá Guð soleiðis klæði grasið, sum í dag er á markini, og í morgin verður kastað inn í ovnin; hvør mikið meira *vil hann klæða* tykkum, O tit av lítlari trúgv?

29 Og søkið ikki tit hvat tit skulu eta, ella hvat tit skulu drekka, eiheldur veri tit av ivingarsomum sinni.

30 Tí at øllum hesum tingum søkja tjóðir heimsins eftir: og tykkara Faðir veit, at tit hava tørv á hesum tingum.

31 ¶ Men heldur søkið tit kongadømi Guðs; og øll hesi ting skulu verða løgd afturat tykkum.

32 Óttast ikki, lítla fylgi; tí at tað er góði hugnaður Faðirs tykkara at geva tykkum kongadømið.

33 Seljið tað tit hava, og gevið ølmussur; útvegið tykkum sjálvum taskur sum ei gerast gamlar, ein skatt í himnunum sum ikki svitast, har eingin tjóvur kemur til, eiheldur mølur spillir.

34 Tí at har *sum* skattur tykkara er, har vil eisini hjarta tykkara vera.

35 Latið lendar tykkara vera umgyrdar, og ljósˇ *tykkara* brennandi;

36 Og tit sjálvir líkir monnum sum bíða eftir harra sínum, tá ið hann vil koma aftur úr brúdleypinum; at tá ið hann kemur og bankar, teir mega lata honum upp við tað sama.

37 Vælsignaðir *eru* teir tænarar, hvørjar harrin, tá ið hann kemur, skal finna vakandi: sanniliga sigi eg tykkum, at hann skal gyrða seg, og fáa teir at setast niður til matar, og vil koma fram og tæna teimum.

38 Og um hann skal koma í hini aðru vøku, ella koma í hini triðju vøku, og finna *teir* soleiðis, vælsignaðir eru teir tænararnir.

39 Og hetta vitið, at um húsfaðirin av húsinum hevði vitað hvønn tíma tjóvurin fór *at* koma, hevði hann havt vakt, og ikki havt loyvt hús sítt at verða brotið ígjøgnum.

40 Verið tit tí tilreiðar eisini: tí at Menniskjusonurin kemur í einum tíma tá ið tit ikki halda.

41 ¶ Pætur segði tá við hann, Harri, talart tú hesa dømisøguna við okkum, ella enntá til øll?

42 Og Harrin segði, Hvør tá er hin trúfasti og vísi húsleiðarin, hvønn harri *hansara* skal gera *til* stjórnara yvir húshaldi sínum, at geva *teimum teirra* verð av mati í rættari tíð?

43 Vælsignaður *er* tann tænarin,

hvønn harri hansara, tá ið hann kemur, skal finna soleiðis gerandi.

44 Av sonnum sigi eg tykkum, at hann vil gera hann *til* stjórnara yvir øllum sum hann hevur.

45 Men og um tann tænarin sigi í hjarta sínum, Mín harri drálar *við* komu síni; og skal byrja at berja tænararnar og tænastukvinnurnar, og at eta og drekka, og at vera drukkin;

46 Harrin hjá tí tænara vil koma í einum degi tá ið hann væntar ikki eftir *honum,* og við ein tíma tá ið hann er ikki varugur,

47 og vil skera hann sundur, og vil tilmála honum hansara lut við hinum vantrúgvandi.

47 Og tann tænarin sum vitsti vilja harra síns, og fyrireikaði ikki *seg sjálvan,* eiheldur gjørdi samsvarandi við vilja hansara, skal verða sligin við mongum *fleingjum.*

48 Men hann sum vitsti ikki, og framdi ting verd til fleingjur, skal verða sligin við fáum *fleingjum.* Tí at hvørjumsumhelst *ið* mikið er givið, av honum skal mikið verða kravt: og til hvørs *ið* menn hava mikið litið til, av honum vilja teir biðja um tess meiri.

49 ¶ Eg eri komin at senda eld á jørðina; og hvat vil eg, um hann veri longu kyndur?

50 Men eg havi ein dóp at verða doyptur við; og hvør eri eg trengdur, til hann verði fullførdur!

51 Halda tit, at eg eri komin at geva frið á jørð? Eg sigi tykkum, Nei; men heldur sundurdeiling:

52 Tí at hiðanífrá skulu tað vera fimm í ēinum húsi sundurdeild, trý ímóti tveimum, og tvey ímóti trimum.

53 Faðirin skal vera sundurdeildur ímóti syninum, og sonurin ímóti faðirinum; móðurin ímóti dótturini, og dóttirin ímóti móðurini; vermóðirin ímóti verdóttur síni, og verdóttirin ímóti vermóður síni.

54 ¶ Og hann segði eisini til fólkið, Tá ið tit síggja eitt skýggj rísa úr vestri, siga tit beinanvegin, Tað kemur eitt æl; og soleiðis verður tað.

55 Og tá ið *tit síggja* sunnanvindin blása, siga tit, Tað verður hiti; og tað hendir.

56 *Tykkara* hyklarar, tit duga at skyna á yvirborði luftarinnar og jarðarinnar; men hvussu er tað at tit ikki skyna á hesi tíðini?

57 Ja, og hví enntá av tykkum sjálvum døma tit ikki hvat er rætt?

58 ¶ Tá ið tú fert við tínum mótstøðumanni til veldismansins, *sum tú ert* á veginum, veit ídni, at tú mást verða útfríaður frá honum; at ikki hann háli teg til dómarans, og dómarin gevi teg yvir til yvirmansins, og yvirmaðurin kasti teg inn í fongsul.

59 Eg sigi tær, tú skalt ei fara avstað haðani, fyrrenn tú hevurt goldið hitt alra síðsta oyra.

KAPITUL 13

HAR vóru hjástaddir á teirri tíð summir sum søgdu honum frá um Galilæararnar, hvørs blóð Pilatus hevði blandað *saman* við teirra sláturofrum.

2 Og Jesus, takandi til orða, segði við teir, Halda tit at hesir Galilæararnir vóru syndarar yvir øllum Galilæarunum, av tí at teir liðu slíkar lutir?

3 Eg sigi tykkum, Nei: men uttan tit vendi um, skulu tit allir líkaleiðis glatast.

4 Ella hasir átjan, uppá hvørjar tornið í Sĭ-lō-ăm fell, og vó teir, hugsa tit at teir vóru syndarar uppum allar menn sum dvaldust í Jerusalem?

5 Eg sigi tykkum, Nei: men uttan tit vendi um, skulu tit allir líkaleiðis glatast.

6 ¶ Hann talaði eisini hesa dømisøgu; Ein ávísur *maður* hevði eitt fikutræ plantað í sínum víngarði; og hann kom og søkti ávøkst á tí, og fann ongan.

7 Tá segði hann við røkjaran av sínum víngarði, Sí, hesi trý ár komi eg, søkjandi ávøkst á hesum fikutræi, og finni ongan: høgg tað niður, hví armar tað jørðina?

8 Og svarandi segði hann við hann, Harri, lat tað vera hetta árið við, til eg skal grava um tað, og taða *tað:*

9 Og um tað beri ávøkst, *gott:* og um ikki, *so* eftir tað skalt tú høgga tað niður.

10 Og hann frálærdi í ēinari av sýnagogunum á sabbatinum.

11 ¶ Og sí, har var ein kvinna sum hevði ein anda av veikleika átjan ár, og var bogin saman, og kundi á ongan hátt rætta upp *seg sjálva*.

12 Og tá ið Jesus sá hana, kallaði hann *hana til sín,* og segði við hana, Kvinna, tú ert loyst frá veikleika tínum.

13 Og hann legði *sínar* hendur á hana: og í stundini varð hon gjørd bein, og dýrðmetti Guð.

14 Og stjórnarin av sýnagoguni tók til orða við harmavreiði, av tí at Jesus hevði grøtt á sabbatsdeginum, og segði við fólkið, Tað eru seks dagar, í hvørjum menn áttu at arbeiða: í teim, tessvegna, komið og verðið grødd, og ikki á sabbatsdeginum.

15 Harrin tá svaraði honum, og segði, *Tín* hyklari, loysir ikki hvør *og* ēin av tykkum á sabbatinum sín oksa ella *sín* asna frá básinum, og leiðir *hann* avstað til vatningar?

16 Og átti ikki henda kvinna, verandi ein dóttir Ábrahams, hvørja Satan hevur bundið, sí, hesi átjan ár, *at* verðið loyst frá hesum bandi á sabbatsdeginum?

17 Og tá ið hann hevði sagt hesi tingini, skammaðust allir hansara mótstandarar: og alt fólkið fegnaðist yvir øll hini dýrdmiklu ting sum vórðu gjørd av honum.

18 ¶ Tá segði hann, Hvørjum er kongadømi Guðs líkt? og við hvat skal eg samanlíkna tað?

19 Tað er líkt einum sinopskorni, sum ein maður tók, og kastaði inn í sín urtagarð; og tað vaks, og gjørdist eitt mikið træ; og fuglar luftarinnar búleikaðust í greinunum á tí.

20 Og aftur segði hann, Við hvat skal eg líkna kongadømi Guðs?

21 Tað er líkt súrdeiggi, sum ein kona tók og goymdi í trimum málum av mjøli, til tað heila var sýrað.

22 Og hann fór ígjøgnum staðirnar og bygdirnar, frálærandi, og ferðandi ímóti Jerusalem.

23 Tá segði ēin við hann, Harri, eru tað fá sum verða frelst? Og hann segði við teir,

24 ¶ Stríðist at ganga inn um hitt tronga portrið: tí at mong, sigi eg tykkum, vilja søkja at ganga inn, og skulu ikki vera før *fyri tí*.

25 Tá ið fyrstani meistarin av húsinum er risin upp, og hevur lokað fyri hurðini, og tit byrja at standa uttanfyri, og at banka við dyrnar, sigandi, Harri, Harri, lat okkum upp; og hann skal svara og siga við tykkum, Eg kenni tykkum ikki hvaðan tit eru:

26 Tá skulu tit byrja at siga, Vit hava etið og drukkið í nærveru tíni, og tú hevurt frálært á gøtum várum.

27 Men hann skal siga, Eg sigi tykkum, Eg kenni tykkum ikki hvaðan tit eru; farið burtur frá mær, allir *tit* virkarar av misgerð.

28 Har skal vera grátur og tannagrísl, tá ið tit skulu síggja Ábraham, og Ísaak, og Jákob, og allar prophetarnar, í kongadømi Guðs, og tykkum *sjálvar* stoyttar út.

29 Og teir skulu koma úr eystri, og *úr* vestri, og úr norðuri, og *úr* suðuri, og skulu setast niður í kongadømi Guðs.

30 Og sí, til eru síðstir sum skulu verða fyrstir, og til eru fyrstir sum skulu verða síðstir.

31 ¶ Hin sama dagin komu ávísir av Pharisēarunum, sigandi við hann, Slepp tær út, og far avstað hiðani: tí Heródes vil drepa teg.

32 Og hann segði við teir, Farið tit, og sigið hasum revinum, Sí, eg kasti út djevlar, og eg geri lekingar í dag og í morgin, og hin triðja *dagin* skal eg verða fullkomnaður.

33 Hóast tað, eg má ganga í dag, og í morgin, og hin fylgjandi *dagin:* tí at tað kann ikki verða, at ein prophetur latist uttanfyri Jerusalem.

34 O Jerusalem, Jerusalem, sum drepurt prophetarnar, og steinart teir sum eru sendir til tín; hvør ofta vildi eg havt savnað tíni børn saman, sum ein høna *savnar* sína løgu undir veingir *sínar,* og tit vildu ikki!

35 Sí, tykkara hús er eftirlatið tykkum oyði: og sanniliga sigi eg tykkum, Tit skulu ikki síggja meg, fyrrenn *tann tíð* kemur tá ið tit skulu siga, Vælsignaður *er* hann sum kemur í navni Harrans.

KAPITUL 14

OG tað bar á, sum hann fór inn í húsið hjá ēinum av teimum hægstu Pharisēarunum at eta breyð á sabbatsdeginum, at teir eygleiddu hann.

2 Og sí, har var ein ávísur maður frammi fyri honum, sum hevði vatnsjúkuna.

3 Og Jesus, takandi til orða, talaði til hinna lógkønu og Pharisēaranna, sigandi, Er tað lógligt at grøða á sabbatsdeginum?

4 Og teir hildu friði sínum. Og hann tók *hann,* og grøddi hann, og læt hann fara;

5 Og tók til orða við teir, sigandi, Hvør av tykkum skal hava ein asna ella ein oksa dotnan í eina holu, og vil ikki beinanvegin toga hann úr á sabbatsdeginum?

6 Og teir fingu ikki svarað honum aftur til hesi tingini.

7 ¶ Og hann setti fram eina dømisøgu til teirra sum vóru bodnir, tá ið hann *legði til* merkis hvussu teir valdu út hinar hægstu sessirnar; sigandi við teir,

8 Tá ið tú ert boðin av onkrum *manni* til brúdleyps, setst ikki niður í tí hægsta plássinum; at ikki ein meiri heiðursamur maður enn tú veri boðin av honum;

9 Og hann, sum beyð tær og honum, komi og sigi til tín, Gev hesum manni rúm; og tú við skomm fari undir at taka tað lægsta plássið.

10 Men tá ið tú ert boðin, far og setst niður í tí lægsta plássinum; at tá ið hann, sum beyð tær, kemur, hann má siga við teg, Vinur, far hægri upp: tá skalt tú hava tilbiðjan í nærveru teirra sum sita til matar við tær.

11 Tí at hvørsumhelst *ið* upphevjar seg sjálvan, skal verða lækkaður; og hann, sum eyðmýkir seg sjálvan, skal verða upphevjaður.

12 ¶ Tá segði hann eisini til hansara sum beyð honum, Tá ið tú gert ein døgverða ella ein náttverða, kalla ikki vinir tínar, ella bróður tínar, eiheldur skyldmenn tínar, ella *tínar* ríku grannar; at ikki teir eisini bjóði tær aftur, og eitt endurgjald verði gjørt tær.

13 Men tá ið tú gert eina veitslu, kalla hinar fátøku, hinar vanføru, hinar lamnu, hinar blindu:

14 Og tú skalt vera vælsignaður; tí at teir kunnu ikki endurgjalda tær: tí at tær skal verða endurgoldið við uppreisn hinna rættvísu.

15 ¶ Og tá ið ēin av teimum, sum sótu til matar við honum, hoyrdi hesi ting, segði hann við hann, Vælsignaður *er* hann sum skal eta breyð í kongadømi Guðs.

16 Tá segði hann við hann, Ein ávísur maður gjørdi eina mikla kvøldmáltíð, og beyð mongum:
17 Og sendi sín tænara um kvøldmatartíð at siga við teir sum vóru bodnir, Komið; tí at øll ting eru nú tilreiðar.
18 Og teir allir ein*mælt* fóru undir at umbera *seg*. Hin fyrsti segði við hann, Eg havi keypt eitt jarðarstykki, og eg má endiliga fara at hyggja *at* tí: eg biði teg halda mær til góða.
19 Og ein annar segði, Eg havi keypt fimm ok av oksum, og eg fari at royna tey: eg biði teg halda mær til góða.
20 Og ein annar segði, Eg havi gift meg við eini konu, og tí kann eg ikki koma.
21 So tann tænarin kom, og sýndi harra sínum hesi ting. Meistarin av húsinum, tá verðandi vreiður, segði til tænara sín, Far út skundisligani út á gøturnar og strætini av staðinum, og før inn higar hinar fátøku, og hinar vanføru, og hinar høltu, og hinar blindu.
22 Og tænarin segði, Harri, tað er gjørt sum tú hevurt áboðið, og tað er enn rúm.
23 Og harrin segði við tænaran, Far út á alfaravegirnar og garðarnar, og noyð *teir* at koma inn, at mítt hús má verða fylt.
24 Tí at eg sigi tykkum, At eingin av teimum monnunum, sum vórðu bodnir, skal smakka av kvøldmáltíð míni.
25 ¶ Og tað fóru miklar mannfjøldir við honum: og hann vendi *sær,* og segði við tey,
26 Um nakar *maður* komi til mín, og hati ikki faðir sín, og móður, og konu, og børn, og brøður, og systrar, ja, og sítt egna lív við, hann kann ikki vera lærusveinur mín.
27 Og hvørsumhelst *ið* ikki ber kross sín, og kemur aftaná mær, kann ikki vera lærusveinur mín.
28 Tí at hvør av tykkum, ætlandi at byggja eitt torn, setst ikki niður fyrst, og roknar kostnaðin, hvørt hann havi *nóg mikið* til at fullføra *tað?*
29 At ikki av hendingi, eftir *at* hann hevur lagt grundvøllin, og er ikki førur fyri at fullføra *tað,* allir, sum skoða *tað,* fari undir at háða hann,
30 Sigandi, Hesin maðurin byrjaði at byggja, og var ikki førur fyri at fullføra.
31 Ella hvør kongur, farandi at føra kríggj ímóti einum øðrum kongi, setst ikki niður fyrst, og ráðførist, hvørt hann veri *seg* førur *fyri* við tíggju túsund at møta honum sum kemur ímóti honum við tjúgu túsund?
32 Ella annars, meðan hīn er enn eina langa leið burturi, sendir hann eitt umboðsmannalið, og tráar friðartreytir.
33 So líkaleiðis, hvørsumhelst *ið* hann veri av tykkum sum yvirgevur ikki alt sum hann hevur, hann kann ikki vera lærusveinur mín.
34 ¶ Salt *er* gott: men um saltið havi mist sín smakk, við hvørjum skal tað verða kryddað?
35 Tað er hvørki egnað til bøin, ella tá til tøðrúgvuna; *heldur* kasta menn tað út. Hann ið hevur oyru at hoyra, lat hann hoyra.

KAPITUL 15

TÁ komu nær at honum allir tollararnir og syndarar*nir* fyri at hoyra hann.
2 Og Pharisēararnir og *hinir* skriftlærdu knarraðu, sigandi, Hesin maðurin tekur ímóti syndarum, og etur við teimum.
3 ¶ Og hann talaði teimum hesa dømisøgu, sigandi,
4 Hvør maður av tykkum, havandi hundrað seyðir, um hann missi ēin teirra, fer ikki frá hinum níggju og níti í oyðuni, og fer eftir

tí sum er burtvilstur, inntil hann finni hann?

5 Og tá ið hann hevur funnið *hann,* leggur hann *hann* á herðar sínar, fagnandi.

6 Og tá ið hann kemur heim, kallar hann saman *sínar* vinir og grannar, sigandi við teir, Fegnist við mær; tí at eg havi funnið mín seyð, sum var burtvilstur.

7 Eg sigi tykkum, at líkaleiðis skal verða frøi í himni yvir ēinum syndara sum vendir um, meira enn yvir níggju og níti rættvísum persónum, hvørjum tarvast onga umvending.

8 ¶ Ella hvør kona, havandi tíggju stykkir av silvuri, um hon missi ēitt stykki, kveikir ikki eitt kertaljós, og sópar húsið, og leitar dúgliga til hon finni *tað?*

9 Og tá ið hon hevur funnið *tað,* kallar hon *sínar* vinir og grannar *sínar* saman, sigandi, Fegnist við mær; tí at eg havi funnið tað stykkið, sum eg hevði mist burtur.

10 Somuleiðis, sigi eg tykkum, er tað fagnaður í nærveru eingla Guðs yvir ēinum syndara, sum vendir um.

11 ¶ Og hann segði, Ein ávísur maður hevði tveir synir:

12 Og hin yngri av teimum segði við faðir *sín,* Faðir, gev mær tann partin av góðsi sum *mær* líknast. Og hann skifti teimum *sítt* livibreyð.

13 Og ei mangar dagar aftaná savnaði hin yngri sonurin alt saman, og tók sína ferð inn í eitt fjarlagið land, og har oyðslaði sína figgjarogn við einum teymaleysum levnaði.

14 Og tá ið hann hevði brúkt alt, reis tað ein mikil hungursneyð í tí landinum; og hann byrjaði at kenna trot.

15 Og hann fór og sameinaði seg til ein borgara av tí landinum; og hann sendi hann út á sínar markir at geva svínum.

16 Og hann vildi fegin havt fylt sín kvið við dravunum sum svínini ótu: og eingin maður gav honum.

17 Og tá ið hann kom til sín sjálvs, segði hann, Hvussu mangir leigaðir tænarar hjá faðir mínum hava nóg mikið av breyði og til yvirs, og eg glatist við hungri!

18 Eg vil reisast og fara til faðirs míns, og vil siga við hann, Faðir, eg havi syndað ímóti himni, og frammi fyri tær,

19 Og eri ei meira verdur at verða kallaður sonur tín: ger meg sum ēin av tínum leigaðu tænarum.

20 Og hann reistist, og kom til faðirs síns. Men tá ið hann var enn ein langan veg burturfrá, sá hansara faðir hann, og hevði várkunn, og rann, og fell um háls hansara, og kysti hann.

21 Og sonurin segði við hann, Faðir, eg havi syndað ímóti himni, og í tíni eygsjón, og eri ei meira verdur at verða kallaður sonur tín.

22 Men faðirin segði við tænarar sínar, Berið fram hina bestu skikkjuna, og latið hann í *hana;* og setið ein ring á hond hansara, og skógvar á føtur *hansara:*

23 Og førið higar gøðingarkálvin, og drepið *hann;* og latum okkum eta, og vera glaðar:

24 Tí at hesin sonur mín var deyður, og er livandi aftur; hann var burtvilstur, og er funnin. Og teir tóku at vera glaðir.

25 Nú, eldri sonur hansara var á markini: og sum hann kom og nærkaðist húsinum, hoyrdi hann tónaspæl og dansan.

26 Og hann kallaði ēin av tænarunum, og spurdi hvat hesi tingini merktu.

27 Og hann segði við hann, Bróðir tín er komin; og faðir tín hevur dripið gøðingarkálvin, av tí at hann hevur fingið hann tryggan og heilan.

28 Og hann varð firtin, og vildi ikki fara inn: tí kom faðir hansara út, og nølaði hann.
29 Og svarandi segði hann við faðir *sín,* Sí, hesi mongu ár tæni eg tær, eiheldur misbreyt eg nakrantíð boð títt: og tó gavst tú mær aldri eitt smálamb, at eg mátti gleðst við vinum mínum:
30 Men so skjótt sum hesin tín sonur var komin, sum hevur etið upp títt livi*breyð* við skøkjum, hevurt tú dripið fyri hann gøðingarkálvin.
31 Og hann segði við hann, Sonur, tú ert ævir hjá mær, og alt sum eg havi er títt.
32 Tað var sømiligt at vit skuldu gleðast, og vera fróir: tí at hesin tín bróðir var deyður, og er livandi aftur; og var burtvilstur, og er funnin.

KAPITUL 16

OG hann segði eisini við lærusveinar sínar, Tað var ein ávísur ríkur maður, sum hevði ein bústjóra; og hin sami var ákærdur honum, at hann hevði oyðslað góðs hansara.
2 Og hann kallaði hann, og segði við hann, Hvussu er tað at eg hoyri hetta um teg? gev *mær* roknskap fyri tín bústjóraskap; tí at tú mást ikki longur vera bústjóri.
3 Tá segði bústjórin innan í sær sjálvum, Hvat skal eg gera? tí at mín harri tekur burtur frá mær bústjóraskapin: eg kann ikki grava; at bidda komi eg mær ikki.
4 Eg eri avráddur *í* hvat gerast skal, *fyri* at, tá ið eg verði settur frá bústjóraskapinum, teir mega taka ímóti mær inn í hús síni.
5 So hann kallaði hvønn *og* ēin av skuldnarum harra síns *til sín,* og segði við hin fyrsta, Hvussu mikið skyldart tú harra mínum?
6 Og hann segði, Hundrað mál av olju. Og hann segði við hann, Tak tína rokning, og setst niður skundisligani, og skriva fimti.
7 Tá segði hann við ein annan, Og hvussu mikið skyldart tú? Og hann segði, Hundrað mál av hveiti. Og hann segði við hann, Tak tína rokning, og skriva fýrsinstjúgu.
8 Og harrin viðmælti hinum órættvísa bústjóra, av tí at hann hevði gjørt hyggjuliga: tí at børnini at hesum heimi eru í síni ætt vísari enn børnini at ljósi.
9 Og eg sigi tykkum, Gerið til tykkara sjálvs vinir av hinum órættvísis-mammon; at, tá ið tit víkja, teir mega taka ímóti tykkum inn í ævigtvarandi bústaðir.
10 Hann sum er trúfastur í tí sum er minst, er trúfastur eisini í nógvum: og hann sum er órættvísur í tí minsta, er órættvísur eisini í nógvum.
11 Um tí tit havi ikki verið trúfastir í tí órættvísa mammon, hvør vil líta tykkum upp í hendur hinar sonnu *ríkdómarnar?*
12 Og um tit havi ikki verið trúfastir í tí sum er annars mans, hvør skal geva tykkum tað sum er tykkar egna?
13 ¶ Eingin tænari kann tæna tveim meistarum: tí at annaðhvørt vil hann hata tann ēina, og elska hīn; ella annars vil hann halda *seg* afturat tí ēina, og vanvirða hīn. Tit kunnu ikki tæna Guði og mammon.
14 Og Pharisēararnir eisini, sum vóru ágirndarsamir, hoyrdu øll hesi ting: og teir útflentu hann.
15 Og hann segði við teir, Tit eru teir sum rættvísgera tykkum sjálvar frammi fyri monnum; men Guð kennir hjørtu tykkara: tí at tað sum er háttliga mett millum manna, er andstygd í eygsjón Guðs.
16 Lógin og prophetarnir *vóru* inntil Jóhannes: síðan ta tíð verður kongadømi Guðs prædikað, og hvør maður pressar inn í tað.

17 Og tað er lættari hjá himni og jørð at ganga undir, enn ēinum stavkróki av lógini at víkja.

18 Hvørsumhelst *ið* koyrir burtur konu sína, og giftist við eini aðrari, fremur hordóm: og hvørsumhelst *ið* giftist við henni sum er koyrd burtur frá manni *sínum,* fremur hordóm.

19 ¶ Tað var ein ávísur ríkur maður, sum var klæddur í purpur og fínt lín, og gleddist marglætisligani hvønn dag:

20 Og tað var ein ávísur biddari nevndur Lāz´-ă-rŭs, sum varð lagdur við hansara portur, fullur í sárum,

21 Og tráandi at verða mettaður við molunum sum fullu frá borðinum hjá tí ríka manninum: harafturat komu hundarnir og sloktu sár hansara.

22 Og tað bar á, at biddarin doyði, og varð av einglunum borin inn í fang Ábrahams: hin ríki maðurin doyði eisini, og varð jarðaður;

23 Og í helviti lyftir hann upp eygum sínum, verandi í pínslum, og sær Ábraham langt burturifrá, og Lāz´-ă-rŭs í fangi hansara.

24 Og hann geylaði og segði, Faðir Ábraham, hav miskunn yvir meg, og send Lāz´-ă-rŭs, at hann má dyppa tippin á sínum fingri í vatn, og svala tungu míni; tí at eg eri pínslaður í hesum loga.

25 Men Ábraham segði, Sonur, minst til, at tú í tíni lívstíð tókst við tínum góðu tingum, og líkaleiðis Lāz´-ă-rŭs illu tingum: men nú er hann troystaður, og tú ert pínslaður.

26 Og umframt alt hetta, ímillum okkum og tykkum er tað eitt mikið svølg fest: so at teir, sum vildu ferðast hiðani frá til tykkara, kunnu ikki; eiheldur kunnu teir ferðast til okkara, sum *vildu komið* haðani frá.

27 Tá segði hann, Eg biði teg tessvegna, faðir, at tú vildirt sent hann til húsar faðirs míns:

28 Tí at eg havi fimm bróður; at hann má vitna fyri teimum, at ikki teir eisini komi inn í hetta pínslustað.

29 Ábraham sigur við hann, Teir hava Móses og prophetarnar; lat teir hoyra teir.

30 Og hann segði, Nei, faðir Ábraham: men um ēin fór til teirra frá teimum deyðu, vilja teir venda um.

31 Og hann segði við hann, Um teir hoyri ikki Móses og prophetarnar, eiheldur vilja teir verða sannførdir, tó *at* ēin reis frá teimum deyðu.

KAPITUL 17

TÁ segði hann við lærusveinarnar, Tað er ómøguligt annað, *enn* at meinbogar vilja koma: men vei *honum,* gjøgnum hvønn teir koma!

2 Tað var betri fyri hann, at ein mylnusteinur varð hongdur um háls hansara, og hann kastaður inn í havið, enn at hann skuldi *volt* ēinum av hesum smáu meinboga.

3 ¶ Gevið gætur eftir tykkum sjálvum: Um bróðir tín misbróti ímóti tær, harta hann; og um hann iðrist, fyrigev honum.

4 Og um hann misbróti ímóti tær sjey ferðir í einum degi, og sjey ferðir í einum degi vendi aftur til tín, sigandi, Eg iðrist; tú skalt fyrigeva honum.

5 Og ápostlarnir søgdu við Harran, Øk vára trúgv.

6 Og Harrin segði, Um tit høvdu trúgv sum eitt sinopskorn, kundu tit sagt við hetta morberjatræið, Veri tú rykt upp við rótini, og veri tú plantað í havið; og tað skuldi lýtt tykkum.

7 Men hvør av tykkum, havandi ein tænara, pløgandi ella føðandi fenað, vil siga við hann við tað sama, tá ið hann er komin

av markini, Far og setst niður til matar?

8 Og vil ikki heldur siga við hann, Ger tilreiðar *tað,* hvarvið eg kann *eta* náttverða, og gyrð teg, og tæn mær, til eg havi etið og drukkið; og síðani skalt tú eta og drekka?

9 Takkar hann tí tænaranum, av tí at hann gjørdi tey ting sum honum vórðu boðin? Eg trúgvi ikki.

10 So líkaleiðis tit, tá ið tit skulu hava gjørt øll tey ting sum tykkum eru boðin, sigið, Vit eru ónýtir tænarar: vit hava gjørt tað sum var okkara skylda at gera.

11 ¶ Og tað bar á, sum hann fór til Jerusalem, at hann fór mitt ígjøgnum Sămár´ĭ-ŭ og Galilēu.

12 Og sum hann fór inn í eina ávísa bygd, møttu honum tíggju menn sum vóru spitalskir, sum stóðu langt burturifrá:

13 Og teir lyftu upp røddum *sínum,* og søgdu, Jesus, Meistari, hav miskunn yvir okkum.

14 Og tá hann sá *teir,* segði hann við teir, Farið, sýnið tykkum at prestunum. Og tað bar á, at sum teir fóru, vórðu teir reinsaðir.

15 Og ēin teirra, tá hann sá at hann var grøddur, vendi aftur, og við harðari rødd dýrðmetti Guð,

16 Og fell niður á *sítt* andlit við hansara føtur, veitandi honum tøkkir: og hann var ein Să-măr-ĭ-tān´-ari.

17 Og svarandi segði Jesus, Vórðu tað ikki tíggju reinsaðir? men hvar *eru* teir níggju?

18 Tað finnast ikki sum komu aftur at geva dýrd til Guðs, uttan hesin fremmandi.

19 Og hann segði við hann, Reis *teg,* far tín veg: tín trúgv hevur gjørt teg heilan.

20 ¶ Og tá ið hann varð kravdur av Pharisēarunum, nær kongadømi Guðs skuldi koma, svaraði hann teimum og segði, Kongadømi Guðs kemur ikki við eygleiðing:

21 Eiheldur skulu teir siga, Sí her! ella, sí har! tí at sí, kongadømi Guðs er innan í tykkum.

22 Og hann segði við lærusveinarnar, Teir dagar vilja koma, tá ið tit skulu tráa at síggja ēin av døgum Menniskjusonarins, og tit skulu ikki síggja *hann*.

23 Og teir skulu siga við tykkum, Sí her; ella, sí har: farið ikki aftaná *teimum,* eiheldur fylgið *teimum*.

24 Tí eins og snarljósið, sum skyggir úr tí ēina *umráðinum* undir himni, skínur at hīnum *umráðinum* undir himni; soleiðis skal eisini Menniskjusonurin vera á degi sínum.

25 Men fyrst má hann líða mangar lutir, og verða vrakaður av hesi ætt.

26 Og eins og tað var á døgum Nó´-ă, soleiðis skal tað vera eisini á døgum Menniskjusonarins.

27 Tey ótu, tey drukku, teir giftust við konum, tær vórðu givnar í giftu, inntil tann dag ið Nó´-ĭ fór inn í ørkina, og flóðin kom, og oyddi tey øll.

28 Somuleiðis eisini sum tað var á døgum Lots; tey ótu, tey drukku, tey keyptu, tey seldu, tey settu niður, tey bygdu;

29 Men tann sama dagin sum Lot fór út úr Sodomu, regnaði eldur og svávul frá himni, og oyddi *tey* øll.

30 Enntá soleiðis skal tað vera á tí degi tá ið Menniskjusonurin verður opinberaður.

31 Á tí degi hann sum skal vera uppiá tekjuni, og hansara ting í húsinum, lat hann ikki koma niður at taka tað burtur: og hann sum er á markini, lat hann somuleiðis ikki venda aftur.

32 Minnist til konu Lots.

33 Hvørsumhelst *ið* skal søkja at frelsa sítt lív, skal missa tað; og hvørsumhelst *ið* skal missa sítt lív, skal varðveita tað.

34 Eg sigi tykkum, í teirri nátt skulu tað vera tveir *menn* í ēinari song; tann ēini skal verða tikin, og hīn skal verða *latin* eftir.
35 Tvær *kvinnur* skulu mala *á kvørn* saman; tann ēina skal verða tikin, og hīn *latin* eftir.
36 Tveir *menn* skulu vera á markini; tann ēini skal verða tikin, og hīn *latin* eftir.
37 Og teir svaraðu og søgdu við hann, Hvar, Harri? Og hann segði við teir, Hvarsumhelst *ið* likamið *er,* hagar vilja ørnirnar verða flykkjaðar saman.

KAPITUL 18

OG hann talaði teimum eina dømisøgu *til hetta endamál,* at menn áttu altíð at biðja, og ikki at maktast;
2 Sigandi, Tað var í einum staði ein dómari, sum óttaðist ikki Guð, eiheldur hevði virðing fyri manni:
3 Og tað var ein einkja í tí staðinum; og hon kom til hansara, sigandi, Veit mær rætt yvir mínum mótstandara.
4 Og hann vildi ikki um stund: men aftaná segði hann innan í sær sjálvum, Hóast eg óttist ikki Guð, ella havi virðing fyri manni;
5 Tó av tí at henda einkja ónáðar meg, vil eg veita henni rætt, at ikki hon við síni áhaldandi komu troytti meg.
6 Og Harrin segði, Hoyrið hvat hin órættvísi dómari sigur.
7 Og skal ikki Guð veita sínum egnu útvaldu rætt, sum rópa dag og nátt til hansara, hóast hann beri leingi yvir við teimum?
8 Eg sigi tykkum, at hann vil veita teim rætt snarligani. Hóast tað, tá ið Menniskjusonurin kemur, skal hann finna trúgv á jørðini?
9 Og hann talaði hesa dømisøgu til ávísar, sum troystaðu á seg sjálvar at teir vóru rættvísir, og vanvirdu aðrar:
10 Tveir menn fóru niðan í templið at biðja; tann ēini ein Pharisēari, og hīn ein tollari.
11 Pharisēarin stóð og bað soleiðis við sær sjálvum, Guð, eg takki tær, at eg eri ikki sum aðrir menn *eru,* peninganoyðarar, órættvísir, hordómsfremjarar, ella enntá sum hesin tollarin.
12 Eg fasti tværreisur í vikuni, eg gevi tíggjundir av øllum sum eg eigi.
13 Og tollarin, standandi langt burturifrá, vildi ikki lyfta upp so mikið sum eygum *sínum* til himins, men bardi uppá sína bringu, sigandi, Guð veri náðigur móti mær, einum syndara.
14 Eg sigi tykkum, hesin maður fór oman til húsa sína rættvísgjørdur *heldur* enn hīn: tí at hvør tann sum upphevjar seg sjálvan, skal verða lækkaður; og hann ið eyðmýkir seg sjálvan, skal verða upphevjaður.
15 Og tey førdu til hansara eisini pinkubørn, at hann vildi nomið við tey: men tá ið *hansara* lærusveinar sóu *tað,* hartaðu teir tey.
16 Men Jesus kallaði teir *til sín,* og segði, Loyvið lítlum børnum at koma til mín, og sýtið teimum ikki: tí at slíkra er kongadømi Guðs.
17 Sanniliga sigi eg tykkum, Hvørsumhelst *ið* skal ikki taka ímóti kongadømi Guðs eins og eitt lítið barn, skal á ongan vís ganga harinn.
18 Og ein ávísur stjórnari spurdi hann, sigandi, Góði Meistari, hvat skal eg gera *fyri* at arva ævigt lív?
19 Og Jesus segði við hann, Hví kallart tú meg góðan? eingin *er* góður, uttan ēin, *tað er,* Guð.
20 Boðini kennirt tú, Frem ikki hordóm, Drep ikki, Stjal ikki, Ber ikki falskan vitnisburð, Æra faðir tín og móður tína.
21 Og hann segði, Øll hesi havi eg hildið frá mínum ungdómi uppeftir.

22 Nú, tá ið Jesus hoyrdi hesi ting, segði hann við hann, Enn vantart tær ēitt ting: sel alt sum tú hevurt, og útdeil teimum fátæku, og tú skalt hava dýrgrip í himni: og kom, fylg mær.

23 Og tá ið hann hoyrdi hetta, varð hann ógvuliga sorgarfullur: tí at hann var sera ríkur.

24 Og tá ið Jesus sá, at hann varð ógvuliga sorgarfullur, segði hann, Hvør treyðugligani skulu teir, sum hava ríkidømir, ganga inn í kongadømi Guðs!

25 Tí at tað er lættari hjá einum kameli at fara ígjøgnum eitt nálareyga, enn hjá einum ríkum manni at ganga inn í kongadømi Guðs.

26 Og teir, sum hoyrdu *tað,* søgdu, Hvør tá kann verða frelstur?

27 Og hann segði, Tey tingini, sum eru ómøgulig við monnum, eru møgulig við Guði.

28 Tá segði Pætur, Sí, vit hava eftirlatið alt, og fylgt tær.

29 Og hann segði við teir, Sanniliga sigi eg tykkum, Tað er eingin maður sum hevur eftirlatið hús, ella foreldur, ella bróður, ella konu, ella børn, fyri skuld kongadømis Guðs,

30 Sum skal ikki móttaka fleirfalt meir í hesi núverandi tíð, og í tí komandi heiminum lív ævigtvarandi.

31 ¶ Tá tók hann *til sín* teir tólv, og segði við teir, Sí, vit fara niðan til Jerusalem, og øll ting, sum eru skrivað av prophetunum viðvíkjandi Menniskjusyninum, skulu verða fullførd.

32 Tí at hann skal verða givin yvir til Heidningarnar, og skal verða háðaður, og illviljaligani viðfarin, og spýttur á:

33 Og teir skulu húðfletta *hann,* og taka hann av lívi: og hin triðja dagin skal hann rísa aftur.

34 Og teir skiltu eingi av hesum tingunum: og henda framsøgn var fjald fyri teimum, eiheldur skynaðu teir tey tingini sum vórðu talaði.

35 ¶ Og tað bar á, at sum hann var komin nær at Jericho, sat ein ávísur blindur maður við vegkantin og biddaði:

36 Og, hoyrandi mannamúgvuna fara framvið, spurdi hann hvat tað merkti.

37 Og tey søgdu honum, at Jesus úr Nazareth fer framvið.

38 Og hann geylaði, sigandi, Jesus, *tú* Sonur Dávids, hav miskunn yvir meg.

39 Og tey, sum fóru undan, hartaðu hann, at hann skuldi halda friði sínum: men hann geylaði so mikið meira, *Tú* Sonur Dávids, hav miskunn yvir meg.

40 Og Jesus stóð, og beyð hann at verða førdan til sín: og tá ið hann var komin nær, spurdi hann hann,

41 Sigandi, Hvat vilt tú at eg skal gera tær? Og hann segði, Harri, at eg má fáa sjón mína.

42 Og Jesus segði við hann, Fá sjón tína: trúgv tín hevur frelst teg.

43 Og alt fyri eitt fekk hann sjón sína, og fylgdi honum, dýrðmetandi Guð: og alt fólkið, tá ið tey sóu *tað,* góvu Guði prís.

KAPITUL 19

OG *Jesus* fór inn í og fór ígjøgnum Jericho.

2 Og sí, *har var* ein maður, nevndur Zăc-chæ´-ūs, sum var hin fremsti millum tollararnar, og hann var ríkur.

3 Og hann søkti at sjá Jesus, hvør hann var; og kundi ikki fyri troðkanini, av tí at hann var lítil av vøkstri.

4 Og hann rann undan, og kleyv upp í eitt morberjatræ at síggja hann: tí hann átti at fara framvið tann *vegin.*

5 Og tá ið Jesus kom til stað-

ið, hugdi hann upp, og sá hann, og segði við hann, Zăc-chæ´-ŭs, skunda tær, og kom niður; tí at í dag má eg steðga í húsi tínum.

6 Og hann skundaði sær, og kom niður, og tók ímóti honum gleðiliga.

7 Og tá ið teir sóu *tað,* knarraðu teir allir, sigandi, At hann var farin at vera gestur hjá einum manni sum er ein syndari.

8 Og Zăc-chæ´-ŭs stóð, og segði við Harran; Sí, Harri, helmingin av mínum góðsi gevi eg til tey fátæku; og um eg havi tikið nakað ting frá nøkrum manni við falskari ákæru, endurbøti eg *honum* ferfalt.

9 Og Jesus segði við hann, Henda dag er frelsa komin til hetta hús, við tað at hann eisini er ein sonur Ábrahams.

10 Tí at Menniskjusonurin er komin at søkja og at frelsa tað sum var burturvilst.

11 Og sum teir hoyrdu hesar lutir, legði hann afturat og talaði eina dømisøgu, av tí at hann var nær við Jerusalem, og av tí at tey hildu at kongadømi Guðs skuldi alt fyri eitt birtast.

12 Hann segði tí, Ein ávísur aðalsmaður fór inn í eitt fjarlagið land at móttaka til sín sjálvs eitt kongadømi, og at koma aftur.

13 Og hann kallaði sínar tíggju tænarar, og fekk teimum tíggju pund, og segði við teir, Haldið í ogn til eg komi.

14 Men hansara borgarar hataðu hann, og sendu eini boð aftaná honum, sigandi, Vit vilja ikki hava henda *mann* at ríkja yvir okkum.

15 Og tað bar á, at tá ið hann var komin aftur, havandi móttikið kongadømið, tá beyð hann hesar tænararnar at verða kallaðar at sær, til hvørja hann hevði givið peningin, at hann mátti vita hvussu mikið hvør maður hevði ávunnið við keypskapi.

16 Tá kom hin fyrsti, sigandi, Harri, pund títt hevur ávunnið tíggju pund.

17 Og hann segði við hann, Væl *gjørt,* tú góði tænari: av tí at tú hevurt verið trúfastur í sera lítlum, havi tú myndugleika yvir tíggju staðum.

18 Og hin annar kom, sigandi, Harri, pund títt hevur ávunnið fimm pund.

19 Og hann segði somuleiðis við hann, Veri tú eisini yvir fimm staðum.

20 Og ein annar kom, sigandi, Harri, sí, *her er* pund títt, sum eg havi goymt lagt niðurfyri í einum borðklæði:

21 Tí at eg óttaðist teg, av tí at tú ert ein strangur maður: tú tekurt upp tað tú ei legðirt niður, og heystart tað tú ei sáaðirt.

22 Og hann sigur við hann, Úr tínum egna munni vil eg døma teg, *tú* vondi tænari. Tú vitstirt at eg var ein strangur maður, takandi upp tað eg ei legði niður, og heystandi tað eg ei sáaði:

23 Hví gavst tú tá ikki mín pening í bankan, at við mína komu eg mátti havt kravt mítt egna við rentu?

24 Og hann segði við teir sum stóðu hjá, Takið frá honum pundið, og gevið *tað* til hansara sum hevur tíggju pund.

25 (Og teir søgdu við hann, Harri, hann hevur tíggju pund.)

26 Tí at eg sigi tykkum, At hvørjum tí sum hevur, skal verða givið; og frá honum sum hevur ikki, enntá tað hann hevur skal verða tikið burtur frá honum.

27 Men hasar mínar figgindar, sum vildu ikki at eg skuldi ríkja yvir teimum, førið higar, og banið *teimum* frammi fyri mær.

28 ¶ Og tá ið hann svá hevði talað, fór hann undan, farandi niðan til Jerusalem.

29 Og tað bar á, tá ið hann

var komin nær til Bĕth-phā´-gê og Bethaniu, við fjallið *sum er* kallað Olivin*fjallið,* sendi hann tveir av sínum lærusveinum,

30 Sigandi, Farið tit inn í bygdina yvir av *tykkum;* í hvørji, við tykkara innkomu, tit skulu finna eitt asnarfyl bundið, hvará aldri maður enn sat: loysið tað, og førið *tað higar.*

31 Og um nakar maður spyrji tykkum, Hví loysa tit *tað?* Soleiðis skulu tit siga við hann, Av tí at Harrin hevur tørv á tí.

32 Og teir sum vórðu sendir, fóru leið sína, og funnu enntá eins og hann hevði sagt við teir.

33 Og, sum teir loystu asnarfylið, søgdu eigarar tess við teir, Hví loysa tit asnarfylið?

34 Og teir søgdu, Harrin hevur tørv á tí.

35 Og teir førdu tað til Jesu: og teir kastaðu síni klæðir uppá asnarfylið, og teir settu Jesus hará.

36 Og sum hann fór, breiddu tey síni klæðir á vegin.

37 Og tá ið hann var komin nær, enntá nú við omangongdina av Olivinfjallinum, byrjaði øll fjøldin av lærusveinunum at fegnast og prísa Guði við harðari rødd fyri øll tey mektigu verkini sum tey høvdu sæð;

38 Sigandi, Vælsignaður *veri* Kongurin sum kemur í navni Harrans: friður í himni, og dýrd í tí hægsta.

39 Og summir av Pharisĕarunum innan úr mannfjøldini søgdu við hann, Meistari, harta lærusveinar tínar.

40 Og hann svaraði og segði við teir, Eg sigi tykkum, at um hesir høvdu hildið friði sínum, skuldu steinarnir í stundini rópt út.

41 ¶ Og tá ið hann var komin nær, skoðaði hann staðin, og grætyvir hann,

42 Sigandi, Um tú hevðirt vitað, enntá tú, í minsta lagi í hesum degi tínum, tey ting *sum tilhoyra* friði tínum! men nú eru tey fjald fyri eygum tínum.

43 Tí at teir dagar skulu koma uppá teg, at tínir fíggindar skulu kasta eina grøv kring teg, og umringa teg umkring, og halda tær inni á hvørjari síðu,

44 Og skulu leggja teg javnan við jørðina, og tíni børn fyri innan teg; og teir skulu ikki eftirlata í tær ēin stein uppiá øðrum; av tí at tú kendirt ei tína vitjunartíð.

45 Og hann fór inn í templið, og tók at kasta út teir sum seldu harí, og teir sum keyptu;

46 Sigandi við teir, Skrivað stendur, Mítt hús er bønarhúsið: men tit hava gjørt tað *til* eitt ránsmannaból.

47 Og hann frálærdi dagligani í templinum. Men teir fremstu prestarnir og hinir skriftlærdu og teir fremstu av fólkinum søktu at oyða hann,

48 Og kundu ikki finna hvat teir máttu gjørt: tí at alt fólkið var sera gáið *um* at hoyra hann.

KAPITUL 20

OG tað bar á, *at* á ēinum av teimum døgunum, sum hann lærdi fólkið í templinum, og prædikaði gleðiboðskapin, komu teir fremstu prestarnir og hinir skriftlærdu uppá *hann* við teimum elstu,

2 Og talaðu við hann, sigandi, Sig okkum, við hvørjum myndugleika gert tú hesi tingini? ella hvør er hann sum gav tær henda myndugleika?

3 Og hann svaraði og segði við teir, Eg vil eisini spyrja tykkum ēitt ting; og svarið mær:

4 Dópur Jóhannesar, var hann frá himni, ella av monnum?

5 Og teir tingaðust við sær sjálvum, sigandi, Um vit skulu siga, Frá himni; vil hann siga, Hví trúðu tit honum tá ikki?

6 Men og um vit siga, Av monnum; vil alt fólkið steina okkum: tí at tey veri sannførd, at Jóhannes var ein prophetur.

7 Og teir svaraðu, at teir kundu ikki siga hvaðani *hann var.*

8 Og Jesus segði við teir, Eiheldur sigi eg tykkum, við hvørjum myndugleika eg geri hesi tingini.

9 Tá fór hann undir at tala til fólkið hesa dømisøgu; Ein ávísur maður plantaði ein víngarð, og leigaði hann út til víngarðsmenn, og fór inn í eitt fjarlagið land í eina langa tíð.

10 Og við tíðina sendi hann ein tænara til víngarðsmenninar, at teir skuldu geva honum av ávøkstinum av víngarðinum: men víngarðsmenninir bardu hann, og sendu *hann* avstað tóm*hent*an.

11 Og aftur sendi hann ein annan tænara: og teir bardu hann eisini, og fóru skammiligani við *honum,* og sendu *hann* avstað tóm*hent*an.

12 Og *upp*aftur sendi hann ein triðja: og teir særdu hann eisini, og kastaðu *hann* út.

13 Tá segði harrin av víngarðinum, Hvat skal eg gera? Eg vil senda mín háttelskaða son: vera má, at teir vilja virðingaróttast *hann,* tá ið teir síggja hann.

14 Men tá ið víngarðsmenninir sóu hann, umhugsaðust teir sín ámillum, sigandi, Hetta er arvingin: kom, latum okkum drepa hann, at arvurin má verða okkara.

15 So teir kastaðu hann út úr víngarðinum, og drópu *hann.* Hvat, tessvegna, skal harrin av víngarðinum gera við teir?

16 Hann skal koma og oyða hesar víngarðsmenn, og skal geva víngarðin til aðrar. Og tá teir hoyrdu *tað,* søgdu teir, Guð sýti *fyri.*

17 Og hann skoðaði teir, og segði, Hvat er hetta tá sum stendur skrivað, Steinurin, sum smiðirnir vrakaðu, hin sami er vorðin høvuðs horn*steinurin?*

18 Hvørsumhelst *ið* skal falla uppá tann steinin, skal verða soraður; men á hvønnsumhelst *ið* hann skal falla, hann skal mylja hann í støv.

19 ¶ Og teir fremstu prestarnir og hinir skriftlærdu ta somu stund søktu at leggja hendur á hann; og teir óttaðust fólkið: tí at teir varnaðust, at hann hevði talað hesa dømisøguna ímóti teimum.

20 Og teir eygleiddu *hann,* og sendu út njósnarar, sum skuldu látast *vera* rættvísir menn, at teir máttu taka hald á hans orðum, at so teir máttu geva hann upp til vald og myndugleika landsstjórans.

21 Og teir spurdu hann, sigandi, Meistari, vit vita at tú sigurt og lærirt rættliga, eiheldur góðtekurt tú persón *nakars mans,* men lærirt veg Guðs sannliga:

22 Er tað lógligt hjá okkum at geva Çæsari íkast, ella ikki?

23 Men hann varnaðist teirra sniðfundni, og segði við teir, Hví freista tit meg?

24 Sýnið mær ein pening. Hvørs mynd og yvirskrift hevur hann? Teir svaraðu og søgdu, Çæsars.

25 Og hann segði við teir, Rindið tí Çæsari tingini sum veri Çæsars, og Guði tingini sum veri Guðs.

26 Og teir kundu ikki taka hald á hans orðum frammi fyri fólkinum: og teir undraðust á svar hansara, og hildu friði sínum.

27 ¶ Tá komu til *hansara* ávísir av Săd-dû-cēē′-arunum, sum avnokta at til er nøkur uppreisn; og teir spurdu hann,

28 Sigandi, Meistari, Móses skrivaði okkum, Um bróðir nakars mans doyggi, havandi konu, og hann doyggi uttan børn, at bróðir hansara skuldi taka konu hansara, og reisa upp bróður sínum sáð.

29 Tað vóru tí sjey brøður: og hin fyrsti fekk *sær* eina konu, og doyði uttan børn.

30 Og hin annar tók hana til konu, og hann doyði barnleysur.

31 Og hin triðji tók hana; og á líkan hátt teir sjey eisini: og teir eftirlótu eingi børn, og doyðu.
32 Síðst av øllum doyði kvinnan eisini.
33 Tessvegna í uppreisnini, hvørs kona av teimum er hon? tí at sjey høvdu hana til konu.
34 Og Jesus svarandi segði við teir, Børnini at hesi verøld giftast, og verða givin í giftu:
35 Men tey sum skulu verða tald verdig at lutast hina verøldina, og uppreisnina frá teimum deyðu, hvørki giftast, ella verða givin í giftu:
36 Eiheldur kunnu tey doyggja meira: tí at tey eru einglunum jøvn; og eru børn Guðs, verandi børn endurreisnarinnar.
37 Nú, at tey deyðu verða reist, sýndi sjálvt Móses við runnin, tá ið hann kallar Harran Guð Ábrahams, og Guð Ísaaks, og Guð Jákobs.
38 Tí at hann er ikki ein Guð teirra deyðu, men teirra livandi: tí at allir liva at honum.
39 ¶ Ávísir av hinum skriftlærdu tá svarandi søgdu, Meistari, tú hevurt væl sagt.
40 Og eftir tað tordu teir ikki *at* spyrja hann nakran *spurning yvirhøvur*.
41 Og hann segði við teir, Hvussu siga teir at Christus er Dávids sonur?
42 Og Dávid sjálvur sigur í Psálmabókini, HARRIN segði við Harra mín, Sit tú við høgru hond mína,
43 Til eg geri tínar fíggindar *til* fótskammul tín.
44 Dávid tessvegna kallar hann Harra, hvussu er hann tá sonur hansara?
45 ¶ Í áhoyrnini av øllum fólkinum segði hann tá við lærusveinar sínar,
46 Verið varnir fyri hinum skriftlærdu, sum tráa at ganga í longum skikkjum, og elska heilsanir á torgunum, og hinar ovastu sessir í sýnagogunum, og hinar fremstu sessir í veitslum;
47 Sum oyðeta húsini hjá einkjum, og fyri eina sýning halda langar bønir: hinir somu skulu fáa størri heldøming.

KAPITUL 21

OG hann hugdi upp, og sá teir ríku menninar kastandi sínar gávur inn í skattkamarið.
2 Og hann sá eisini eina ávísa fátæka einkju, kastandi inn hagar tveir smápeningar.
3 Og hann segði, Av sonnum sigi eg tykkum, at henda fátæka einkja hevur kastað inn meir enn teir allir:
4 Tí at allir hesir hava av síni yvirflóð kastað inn afturat ofrum Guðs: men hon av síni armóð hevur kastað inn alt tað livibreyðið sum hon hevði.
5 ¶ Og sum nakrir talaðu um templið, hvussu tað var prýtt við vøkrum steinum og gávum, segði hann,
6 *Hvat* hesum tingunum, sum tit skoða, *viðvíkur,* teir dagar vilja koma, í hvørjum tað skal ikki verða eftirlatin ein steinur uppiá øðrum, sum skal ikki verða kastaður niður.
7 Og teir spurdu hann, sigandi, Meistari, men nær skulu hesi tingini verða? og hvat tekin *vil vera,* tá ið hesi ting skulu bera á?
8 Og hann segði, Gevið gætur, at tit verði ikki villleiddir: tí at mangir skulu koma í navni mínum, sigandi, Eg eri *Christus;* og tíðin nærkast: farið tit ikki, tessvegna, aftaná teimum.
9 Men tá ið tit skulu hoyra um kríggj˘ og ófriðir, verðið ikki ræðsluslignir: tí at hesi tingini mugu fyrst bera á; men endin *er* ikki alt fyri eitt.
10 Tá segði hann við teir, Tjóð

skal rísa ímóti tjóð, og kongadømi ímóti kongadømi:
11 Og miklir jarðskjálvtar skulu verða á ymsum støðum, og hungursneyðir, og drepsóttir; og óttaligar sjónir og mikil tekin skulu verða frá himni.
12 Men áðrenn øll hesi, skulu teir leggja sínar hendur á tykkum, og søkja at *tykkum,* gevandi *tykkum* upp til sýnagogurnar, og inn í fongsul, verðandi førdir framfyri kongar og stjórnarar fyri navns míns skuld.
13 Og tað skal vendast tykkum til vitnisburðar.
14 Gerið *tað* av, tessvegna, í tykkara hjørtum, ikki at grunda yvir áðrenn hvat tit skulu svara:
15 Tí eg vil geva tykkum munn og vísdóm, hvørjum allir tykkara mótstandarar skulu ikki vera førir fyri at mótsiga ella mótstanda.
16 Og tit skulu verða sviknir bæði av foreldrum, og brøðrum, og skyldfólkum, og vinum; og *summar* av tykkum skulu teir volda at verða tiknar av lívi.
17 Og tit skulu verða hataðir av øllum *monnum* fyri navns míns skuld.
18 Men tað skal ikki eitt hár av tykkara høvdi farast.
19 Í tykkara tolmóði ognist tit sálir tykkara.
20 Og tá ið tit skulu síggja Jerusalem umringað við herliðum, tá vitið at hennara oyðing er í nánd.
21 Tá lat tey, sum eru í Judæu, flýggja til fjallanna; og lat tey, sum eru í miðju tess, fara avstað út; og lat ikki tey, sum eru á lands*umráð*unum, fara harinní.
22 Tí at hesir veri hevndardagarnir, at øll ting, sum eru skrivað, mega verða uppfylt.
23 Men vei teimum ið eru við barn, og teimum ið geva *at* súgva í teimum døgum! tí at tað skal verða mikil neyð í landinum, og vreiði uppiá hesum fólkinum.
24 Og tey skulu falla við˙ svørðseggini, og skulu verða leidd burtur hertikin inn í allar tjóðir: og Jerusalem skal verða traðkað niður av Heidningunum, inntil Heidninganna tíðir verði uppfyltar.
25 ¶ Og tað skulu verða tekin í sólini, og í mánanum, og í stjørnunum; og uppiá jørðini neyð av tjóðum, við ruðuleika; havið og aldurnar ýlandi;
26 Hjørtu manna svíkjandi teir vegna ótta, og vegna væntan eftir teimum tingunum sum koma á jørðina: tí at kreftur himins skulu verða skakaðar.
27 Og tá skulu tey síggja Menniskjusonin komandi í einum skýggi við mátti og miklari dýrd.
28 Og tá ið hesi tingini byrja at bera á, tá hyggið upp, og lyftið upp høvdum tykkara; tí at tykkar endurloysing nærkast.
29 Og hann talaði til teirra eina dømisøgu; Skoðið fikutræið, og øll trøini;
30 Tá ið tey nú skjóta fram, *tá* síggja tit og vita við tykkum sjálvum, at summar nú er nær fyri hond.
31 So líkaleiðis tit, tá ið tit síggja hesi tingini bera á, *tá* vitið tit, at kongadømi Guðs er nær fyri hond.
32 Sanniliga sigi eg tykkum, Henda ætt skal ikki ganga undir, fyrrenn alt verði uppfylt.
33 Himin og jørð skulu ganga undir: men orðini hjá mær skulu ikki ganga undir.
34 ¶ Og gevið gætur eftir tykkum sjálvum, at ikki til nakra tíð tykkara hjørtu verði ovbyrðað við óhógvi, og drykkjuskapi, og stúranum av hesum lívi, og *so* tann dagur komi uppá tykkum óvarugt.
35 Tí at sum ein snerra skal hann koma á allar teir sum búgva á yvirborðinum á allari jørðini.
36 Vakið tit tí, og biðjið altíð, at tit mega verða roknaðir verdigir

at komast undan øllum hesum tingunum sum skulu bera á, og at standast frammi fyri Menniskjusyninum.

37 Og um dagin frálærdi hann í templinum; og um nátt*ina* fór hann út, og dvaldi á fjallinum sum kallast Olivin*fjallið*.

38 Og alt fólkið kom árla um morgunin til hansara í templinum, fyri at hoyra hann.

KAPITUL 22

NÚ, hátíð ósúrgaðs breyðs nærkaðist, sum kallast Umleypið.

2 Og teir fremstu prestarnir og skriftlærdu søktu hvussu teir máttu dripið hann; tí at teir óttaðust fólkið.

3 ¶ Tá fór Satan inn í Judas, tilnevndur Iscariot, verandi í tali teirra tólv.

4 Og hann fór sín veg, og samtalaði við fremstu prestarnar og høvuðsmenn*inar,* hvussu hann mátti svikið hann til teirra.

5 Og teir vórðu glaðir, og sáttmálaðu at geva honum pening.

6 Og hann lovaði, og søkti høvi til at svíkja hann til teirra í fráveruni av mannfjøldini.

7 ¶ Tá kom dagur ósúrgaðs breyðs, tá ið umleypið má verða dripið.

8 Og hann sendi Pætur og Jóhannes, sigandi, Farið og fyribúgvið okkum umleypið, at vit mega eta.

9 Og teir søgdu við hann, Hvar vilt tú at vit fyribúgva?

10 Og hann segði við teir, Sí, tá ið tit eru komnir inn í staðin, skal ein maður møta tykkum, berandi eina krukku av vatni; fylgið honum inn í húsið har hann fer inn.

11 Og tit skulu siga við húsfaðirin av húsinum, Meistarin sigur við teg, Hvar er gestakamarið, har eg skal eta umleypið við lærusveinum mínum?

12 Og hann skal sýna tykkum eitt stórt ovara rúm tilreitt: har gerið tilreiðar.

13 Og teir fóru, og funnu eins og hann hevði sagt við teir: og teir gjørdu tilreiðar umleypið.

14 Og tá ið tímin var komin, settist hann niður, og hinir tólv ápostlarnir við honum.

15 Og hann segði við teir, Við trá havi eg tráað at eta hetta umleypið við tykkum, áðrenn eg líði:

16 Tí at eg sigi tykkum, Eg vil ikki meira eta av tí, inntil tað verði uppfylt í kongadømi Guðs.

17 Og hann tók bikarið, og veitti tøkkir, og segði, Takið hetta, og skiftið *tað* millum tykkara:

18 Tí at eg sigi tykkum, Eg vil ikki drekka av fruktini av víntræinum, inntil kongadømi Guðs skal koma.

19 ¶ Og hann tók breyð, og veitti tøkkir, og breyt *tað,* og gav teimum, sigandi, Hetta er mítt likam sum verður givið fyri tykkum: gerið hetta í endurminning um meg.

20 Somuleiðis eisini bikarið eftir kvøldmáltíðina, sigandi, Hetta bikarið *er* hitt nýggja testamenti í blóði mínum, sum verður úthelt fyri tykkum.

21 ¶ Men sí, hond hansara, sum svíkur meg, *er* hjá mær á borðinum.

22 Og sanniliga, Menniskjusonurin fer, eins og tað varð avrátt: men vei tí manninum, við hvørjum hann verður svikin!

23 Og teir tóku at fregnast sín ámillum, hvør teirra tað var sum skuldi gera henda lut.

24 ¶ Og har varð eisini ein træta teirra millum, hvør teirra skuldi verið taldur hin størsti.

25 Og hann segði við teir, Kongarnir hjá heidningunum útinna harradømi yvir teimum; og teir, sum útinna myndugleika yvir teir, verða kallaðir góðgerðarmenn.

26 Men tit *skulu* ikki *vera* so: men hann, ið er størstur tykkara millum, lat hann vera sum hin yngri; og hann, ið er fremstur, sum hann ið tænir.

27 Tí at hvør *er* størri, hann ið situr til matar, ella hann ið tænir? *er* ikki hann ið situr til matar? men eg eri tykkara millum sum hann ið tænir.

28 Tit eru teir sum hava hildið á við mær í mínum freistingum.

29 Og eg fyriskipi tykkum eitt kongadømi, eins og Faðir mín hevur fyriskipað mær;

30 At tit mega eta og drekka við borð mítt í mínum kongadømi, og sita á trónum, dømandi hinar tólv ættargreinir Ísraels.

31 ¶ Og Harrin segði, Símun, Símun, sí, Satan hevur umbiðið *at fáa* tykkum, at hann má sálda *tykkum* sum hveiti:

32 Men eg havi biðið fyri tær, at trúgv tín svíki ikki: og tá tú ert vendur um, styrk brøður tínar.

33 Og hann segði við hann, Harri, eg eri tilreiðar at fara við tær, bæði inn í fongsul, og til deyða.

34 Og hann segði, Eg sigi tær, Pætur, hanin skal ikki gala henda dag, fyrrenn at tú skalt trærreisur avnokta at tú kennirt meg.

35 Og hann segði við teir, Tá ið eg sendi tykkum uttan pung, og pjøka, og skógvar, vantaði tykkum nakað? Og teir søgdu, Einkið.

36 Tá segði hann við teir, Men nú, hann ið hevur pung, lat hann taka *hann,* og somuleiðis pjøka *sín:* og hann ið einkið svørð hevur, lat hann selja klæði sítt, og keypa ēitt.

37 Tí at eg sigi tykkum, At hetta, sum skrivað stendur, má enn verða fullført í mær, Og hann varð roknaður millum lógbrotsmenninar: tí at tingini, viðvíkjandi mær, hava ein enda.

38 Og teir søgdu, Harri, sí, her *eru* tvey svørð. Og hann segði við teir, Tað er nóg mikið.

39 ¶ Og hann kom út, og fór, sum hann var vanur, til Olivinfjallsins; og hansara lærusveinar fylgdu honum eisini.

40 Og tá ið hann var á staðnum, segði hann við teir, Biðjið, at tit komi ikki inn í freisting.

41 Og hann var *sær* drigin undan frá teimum umleið eitt steinkast, og knelaði niður, og bað,

42 Sigandi, Faðir, um tú veri viljugur, tak burtur hetta bikar frá mær: hóast hetta, ikki vilji mín, men tín, veri gjørdur.

43 Og tað birtist honum ein eingil frá himni, styrkjandi hann.

44 Og, verandi í einum kvøljustríði, bað hann meiri inniligani: og hansara sveitti varð sum vóru tað stórir blóðsdropar, fallandi niður til jarðarinnar.

45 Og tá ið hann reis upp frá bøn, og var komin til lærusveina sína, fann hann teir sovandi av sorg,

46 Og segði við teir, Hví sova tit? reisist og biðjið, at ikki tit innfari inn í freisting.

47 ¶ Og meðan hann enn talaði, sí ein mannfjøld, og hann, sum kallaðist Judas, ēin av teimum tólv, fór undan teimum, og nærkaðist Jesusi at kyssa hann.

48 Men Jesus segði við hann, Judas, svíkurt tú Menniskjusonin við einum kossi?

49 Tá ið teir, sum vóru um hann, sóu hvat fylgja vildi, søgdu teir við hann, Harri, skulu vit sláa *til* við svørðinum?

50 ¶ Og ēin teirra sló tænaran hjá høvuðsprestinum, og skar av høgra oyra hansara.

51 Og Jesus tók til orða og segði, Loyvið tit so langt. Og hann nam við oyra hansara, og grøddi hann.

52 Tá segði Jesus við teir fremstu prestarnar, og høvuðsmenninar av templinum, og hinar elstu, sum vóru komnir til hansara, Veri tit

komnir út, sum ímóti einum ránsmanni, við svørðum og stavum?
53 Tá ið eg var dagligani hjá tykkum í templinum, rættu tit út ongar hendur ímóti mær: men hetta er tykkara tími, og máttur myrkursins.
54 ¶ Tá tóku teir hann, og leiddu *hann,* og førdu hann inn í húsið hjá høvuðsprestinum. Og Pætur fylgdi langt burturifrá.
55 Og tá ið teir høvdu kynt ein eld í miðjum garðinum, og vóru setstir niður saman, settist Pætur niður teirra millum.
56 Men ein ávís terna skoðaði hann, sum hann sat við eldin, og álvarsamligani hugdi uppá hann, og segði, Hesin maðurin var eisini við honum.
57 Og hann avnoktaði hann, sigandi, Kvinna, eg kenni hann ikki.
58 Og eftir eina lítla løtu sá ein annar hann, og segði, Tú ert eisini av teimum. Og Pætur segði, Maður, eg eri ikki.
59 Og umleið skeiðið á ēin tíma aftaná váttaði ein annar sannførandi, sigandi, Av sonnum, hesin *felagin* eisini var við honum: tí at hann er ein Galilǣari.
60 Og Pætur segði, Maður, eg veit ikki hvat tú sigurt. Og alt fyri eitt, meðan hann enn talaði, gól hanin.
61 Og Harrin vendi *sær,* og hugdi uppá Pætur. Og Pætur mintist orðið hjá Harranum, hvussu hann hevði sagt við hann, Áður enn hanin gelur, skalt tú avnokta meg trærreisur.
62 Og Pætur fór út, og grætt beiskliga.
63 ¶ Og menninir, sum hildu Jesusi, háðaðu hann, og slógu *hann*.
64 Og tá ið teir høvdu bundið fyri eyguni á honum, slógu teir hann á andlitið, og spurdu hann, sigandi, Prophetera, hvør er tað ið sló teg?
65 Og mong onnur ting Guðsspottanarligani talaðu teir ímóti honum.
66 ¶ Og so skjótt sum tað var dagur, komu hinir elstu fólksins og hinir fremstu prestarnir og hinir skriftlærdu saman, og leiddu hann inn í ráð sítt, sigandi,
67 Ert tú Christus˜? sig okkum. Og hann segði við teir, Um eg sigi tykkum, *so* vilja tit ikki trúgva:
68 Og um eg eisini spyrji *tykkum, so* vilja tit ikki svara mær, ella lata *meg* fara.
69 Hereftir skal Menniskjusonurin sita við høgru hond Guðs kraftar.
70 Tá søgdu teir allir, Ert tú tá Sonur Guðs? Og hann segði við teir, Tit siga at eg eri.
71 Og teir søgdu, Hvat tarvast okkum longur vitnisburð? tí at vit sjálvir hava hoyrt av hans egna munni.

KAPITUL 23

OG øll fjøldin av teimum reistist, og leiddu hann til Pilatusar.
2 Og teir tóku at ákæra hann, sigandi, Vit funnu henda *felaga* spillandi tjóðina, og forbjóðandi at geva íkast til Çæsars, sigandi, at sjálvur hann er Christus — ein Kongur.
3 Og Pilatus spurdi hann, sigandi, Ert tú Kongur Jødanna? Og hann svaraði honum og segði, Tú sigurt *tað*.
4 Tá segði Pilatus til teir fremstu prestarnar og *til* fólkið, Eg finni ongan feil í hesum manninum.
5 Og teir vórðu tess meiri ógvusligir, og søgdu, Hann øsir upp fólkið, frálærandi út gjøgnum alla Judǣu, byrjandi frá Galilēu til hetta staðið.
6 Tá ið Pilatus hoyrdi um Galilēu, spurdi hann hvørt maðurin var ein Galilǣari.

7 Og so skjótt sum hann vitsti at hann hoyrdi til ættardømis Heródesar, sendi hann hann til Heródesar, sum sjálvur eisini var í Jerusalem um tað mundið.

8 ¶ Og tá ið Heródes sá Jesus, varð hann avbera glaður: tí at hann var tráiligur at sjá hann um langt *tíðarbil,* av tí at hann hevði hoyrt mong ting um hann; og hann vónaði at hava sæð okkurt kraftarverk gjørt av honum.

9 Tá spurdist hann við hann í mongum orðum; men hann svaraði honum einkið aftur.

10 Og teir fremstu prestarnir og skriftlærdu stóðu og ákærdu hann ógvusliga.

11 Og Heródes við sínum krígsmonnum gjørdi hann til einkiðs, og háðaði *hann,* og skrýddi hann í eina glæsiliga skikkju, og sendi hann aftur til Pilatusar.

12 ¶ Og hin sama dagin gjørdust Pilatus og Heródes vinmenn saman: tí at áður lógu teir í fíggindskapi sín ámillum.

13 ¶ Og Pilatus, tá ið hann hevði kallað saman teir fremstu prestarnar og stjórnarmenninar og fólkið,

14 Segði við tey, Tit hava ført henda mann til mín, sum ein ið spillir fólkið: og sí, eg, havandi rannsakað *hann* frammi fyri tykkum, havi ongan feil funnið í hesum manninum viðvíkjandi teimum tingunum, um hvørji tit ákæra hann:

15 Nei, eiheldur tá Heródes: tí at eg sendi tykkum til hansara; og sí, einkið deyða vert er gjørt yvirfyri honum.

16 Eg vil tí aga hann, og lata *hann* leysan.

17 (Tí av neyðsyn mátti hann lata teimum ein leysan á hátíðini.)

18 Og tey róptu út øll í senn, sigandi, Burtur við hesum *manninum,* og lat okkum Bár´-ăb-băs leysan:

19 (Sum fyri ávísan ófrið, framdan í staðinum, og fyri morð, var kastaður inn í fongsul.)

20 Pilatus tí villigur at lata Jesus leysan, talaði aftur til teirra.

21 Men tey geylaðu, sigandi, Krossfest *hann,* krossfest hann.

22 Og hann segði við tey *fyri* triðju ferð, Hví, hvat ilt hevur hann gjørt? Eg havi funnið onga grund til deyða í honum: eg vil tí aga hann, og lata *hann* fara.

23 Og tey vóru ástreingjandi við hørðum røddum, krevjandi at hann mátti verða krossfestur. Og røddirnar hjá teimum og hjá teimum fremstu prestunum høvdu yvirvág.

24 Og Pilatus lýsti dóm, at tað skuldi verða sum tey kravdu.

25 Og hann læt teimum leysan hann sum fyri uppreist og morð var kastaður inn í fongsul, hvønn tey høvdu tráað; men hann gav Jesus yvir til teirra vilja.

26 Og sum teir leiddu hann avstað, løgdu teir hald á ein Sí-mun, ein Cý-rē´-nē-ing, komandi uttan av landinum, og á hann løgdu teir krossin, at hann mátti bera *hann* aftaná Jesusi.

27 ¶ Og tað fylgdi honum ein mikil flokkur av fólki, og av kvinnum, sum eisini grótu og harmaðu hann.

28 Men Jesus, vendandi *sær* at teimum, segði, Jerusalems døtur, grátið ikki um meg, men grátið um tykkum sjálvar, og um børn tykkara.

29 Tí at sí, teir dagar koma, í hvørjum tey skulu siga, Vælsignaðar *eru* ófruktirnar, og tey móðurlív sum aldri føddu, og tey bróst sum aldri góvu at súgva.

30 Tá skulu tey byrja at siga til fjallanna, Fallið á okkum; og til heyggjanna, Dekkið okkum.

31 Tí at um teir geri hesi ting í einum grønum træi, hvat skal verða gjørt í tí turra?

32 Og har vóru eisini tveir aðrir, illgerðarmenn, leiddir *saman* við honum at verða tiknir av lívi.

33 Og tá ið teir vóru komnir til staðið, sum er kallað Skøltur, har krossfestu teir hann, og illgerðarmenninar, ēin við høgru hondina, og hīn við ta vinstru.

34 ¶ Tá segði Jesus, Faðir, fyrigev teimum; tí at teir vita ikki hvat teir gera. Og teir skiftu hansara klædnað, og kastaðu lutir.

35 Og fólkið stóð eygleiðandi. Og stjórnarmenninir eisini við teimum útflentu *hann,* sigandi, Hann frelsti onnur; lat hann frelsa seg sjálvan, um hann veri *seg* Christus, Guðs útvaldi.

36 Og hermenninir eisini háðaðu hann, komandi til hansara, og bjóðandi honum edik,

37 Og sigandi, Um tú veri *teg* kongur Jødanna, frels teg sjálvan.

38 Og ein yvirskrift eisini varð ritað yvir honum við Grikskum, og Latínskum, og Hebrāiskum bókstøvum, HESĪN ER KONGUR JØDANNA.

39 ¶ Og ēin av illgerðarmonnunum, sum vórðu hongdir, deildi eftir honum, sigandi, Um tú veri *teg* Christus, frels teg sjálvan og okkum.

40 Men svarandi hartaði hīn hann, sigandi, Óttast tú ikki Guð, við tað at tú ert í tí somu fordømingini?

41 Og vit víst rættvísligani; tí at vit fáa rætta endurgjaldið fyri okkara gerðir: men hesin maðurin hevur einkið órætt gjørt.

42 Og hann segði við Jesus, Harri, minst til mín, tá ið tú kemurt inn í kongadømi títt.

43 Og Jesus segði við hann, Sanniliga sigi eg tær, Í dag skalt tú vera við mær í pāradís.

44 Og tað var um hin sætta tíma, og tað varð eitt myrkur yvir allari jørðini inntil hin níggjunda tíma.

45 Og sólin varð myrkjað, og forhangið av templinum varð skrætt í miðjuni.

46 ¶ Og tá ið Jesus hevði ropt við harðari rødd, segði hann, Faðir, inn í tínar hendur eg líti upp anda mín: og, havandi svá sagt, gav hann upp andan.

47 Nú, tá ið hundraðsovastin sá hvat var gjørt, dýrðmetti hann Guð, sigandi, Vissuliga, hetta var ein rættvísur maður.

48 Og alt fólkið sum kom saman til ta sjónina, skoðandi tingini sum vórðu gjørd, bardu seg fyri bringu, og vendu aftur.

49 Og allir hansara kunningar, og kvinnurnar sum fylgdu honum frá Galilēu, stóðu langt burturifrá, skoðandi hesi ting.

50 ¶ Og sí, *har var* ein maður, nevndur Jóseph, ein ráðharri; *og hann var* ein góður maður, og ein rættvísur:

51 (Hin sami hevði ikki samtykt fyri teirra ráði og verki;) *hann var* úr Âr-ĭ-mă-thæ´-ū, einum staði hjá Jødunum: sum eisini sjálvur vænt-aði eftir kongadømi Guðs.

52 Hesin *maður* fór til Pilatusar, og biddaði likam Jesusar.

53 Og hann tók tað niður, og sveipaði tað í línklæði, og legði tað í eitt gravhýsi, sum var høgt í stein, hvarí aldri maður fyrr var lagdur.

54 Og tann dagurin var fyrireikingin, og sabbaturin stundaði til.

55 Og kvinnurnar eisini, sum komu við honum frá Galilēu, fylgdu aftaná, og skoðaðu gravhýsið, og hvussu hansara likam varð lagt.

56 Og tær vendu aftur, og tilreiddu *angandi* kryddurtir og salvur; og hvíldu sabbatsdagin samsvarandi við boðið.

KAPITUL 24

NÚ, uppá hin fyrsta *dag* viknunnar, reiðuliga árla um morgunin, komu tær at gravhýsinum, komandi við hinum *angandi*

kryddurtum sum tær høvdu tilreitt, og ávísar *aðrar* við teimum.
2 Og tær funnu steinin rullaðan burtur frá gravhýsinum.
3 Og tær fóru inn, og funnu ikki likam Harrans Jesu.
4 Og tað bar á, sum tær vóru mikið ørkymlaðar um tað, sí, tveir menn stóðu hjá teimum í skínandi klæðum:
5 Og, sum tær vórðu ræddar, og boygdu niður *síni* andlit til jarðarinnar, søgdu teir við tær, Hví sóknast tit eftir teimum livandi millum hinna deyðu?
6 Hann er ikki her, men er *upp*risin: minnist hvussu hann talaði við tykkum, tá ið hann var enn í Galilēu,
7 Sigandi, Menniskjusonurin má verða givin upp í hendurnar á syndafullum monnum, og verða krossfestur, og hin triðja dagin rísa aftur.
8 Og tær mintust aftur orðini hjá honum,
9 Og vendu aftur frá gravhýsinum, og søgdu teimum ellivu øll hesi ting, og fyri øllum hīnum.
10 Tað var Maria Măg-dă-lē′nă; og Jó-ăn′-nă; og Maria, *móðir* Jákobs; og aðrar *kvinnur íð vóru* við teimum, sum søgdu ápostlunum hesi ting.
11 Og orðini hjá teimum tóktust teimum sum tómar søgur, og teir trúðu teimum ikki.
12 Tá reistist Pætur, og rann at gravhýsinum; og, húkandi niður, skoðaði hann línklæðini løgd fyri seg sjálv, og fór avstað, undrandi í sær sjálvum á tað sum á hevði borið.
13 ¶ Og sí, tveir av teimum fóru hin sama dagin til eina bygd, kallað Ēm′-mă-ŭs, sum var frá Jerusalem *umleið* trísinstjúgu stádiur.
14 Og teir talaðu saman um øll hesi ting ið vóru hend.
15 Og tað bar á, at meðan teir talaðu *saman* og skiftu orð, Jesus sjálvur nærkaðist, og fór við teimum.
16 Men teirra eygu vórðu hildin, at teir skuldu ikki kenna hann.
17 Og hann segði við teir, Hvørsháttar samtalur *eru* hesar sum tit hava hvør við annan, sum tit ganga, og eru daprir?
18 Og tann ēini teirra, hvørs navn var Clē′-ō-pās, svarandi segði við hann, Ert tú einans fremmandur í Jerusalem, og hevurt ikki vitað tey tingini sum á hava borið har í hesum døgum?
19 Og hann segði við teir, Hvørji ting? Og teir søgdu við hann, Viðvíkjandi Jesusi úr Nazareth, sum var ein prophetur, mektigur í gerð og orði frammi fyri Guði og øllum fólkinum:
20 Og hvussu teir fremstu prestarnir og okkara stjórnarar góvu hann upp til at verða fordømdan til deyða, og hava krossfest hann.
21 Men vit troystaðu *á*, at tað hevði verið hann sum skuldi havt endurloyst Ísrael: og umframt alt hetta, í dag er hin triðji dagurin síðan hesi tingini vórðu gjørd.
22 Ja, og ávísar kvinnur eisini úr okkara samlagi gjørdu okkum ekkafullar, sum vóru snimma hjá gravhýsinum;
23 Og tá ið tær funnu ikki likam hansara, komu tær, sigandi at tær høvdu eisini sæð eina sjón av einglum, sum søgdu at hann var livandi.
24 Og ávísir av teimum sum vóru við okkum, fóru til gravhýsið, og funnu *tað* enntá soleiðis sum kvinnurnar høvdu sagt: men hann sóu teir ikki.
25 Tá segði hann við teir, O dárar, og seinførir av hjarta at trúgva øllum sum prophetarnir hava talað:
26 Átti ikki Christus at hava liðið hesi ting, og at fara inn í sína dýrd?
27 Og, byrjandi við Mósesi

og øllum prophetunum, útlegði hann teimum í øllum skriftunum tingini viðvíkjandi sær sjálvum.
28 Og teir nærkaðust bygdini, hvagar teir fóru: og hann gjørdi sum um hann vildi havt farið longur.
29 Men teir noyddu hann, sigandi, Verð hjá okkum: tí at tað er ímóti kvøldi, og dagurin er langt liðin. Og hann fór inn at dvølja hjá teimum.
30 Og tað bar á, sum hann sat til matar við teimum, tók hann breyð, og vælsignaði *tað,* og breyt, og gav til teirra.
31 Og teirra eygu vórðu opnað, og teir kendu hann; og hann hvarv úr sjón teirra.
32 Og teir søgdu hvør við annan, Brann ikki okkara hjarta innan í okkum, meðan hann talaði við okkum eftir veginum, og meðan hann opnaði skriftirnar fyri okkum?
33 Og teir risu upp hin sama tíman, og vendu aftur til Jerusalem, og funnu teir ellivu savnaðar saman, og tey sum hjá teimum vóru,
34 Sigandi, Harrin veruliga er risin, og hevur birtst fyri Símuni.
35 Og teir søgdu frá hvørji ting *vórðu gjørd* á veginum, og hvussu hann varð kendur av teimum í bróting av breyði.
36 ¶ Og sum teir soleiðis talaðu, stóð Jesus sjálvur í teirra mittu, og sigur við teir, Friður *veri* at tykkum.
37 Men teir vórðu ógvaðir og ræðsluslignir, og hildu at teir høvdu sæð ein anda.
38 Og hann segði við teir, Hví eru tit órógvaðir? og hví rísa upp hugsanir í tykkara hjørtum?
39 Skoðið mínar hendur og mínar føtur, at tað eri eg sjálvur: handfarið meg, og síggið; tí ein andi hevur ikki kjøt og bein, sum tit síggja meg hava.
40 Og tá ið hann svá hevði talað, sýndi hann teimum *sínar* hendur og *sínar* føtur.
41 Og meðan teir enn trúðu ikki fyri fagnaði, og undraðust, segði hann við teir, Hava tit her nakran mat?
42 Og teir góvu honum eitt stykki av einum stoktum fiski, og av eini hunangskøku.
43 Og hann tók *tað,* og át frammi fyri teimum.
44 Og hann segði við teir, Hetta *eru* orðini sum eg talaði við tykkum, meðan eg var enn hjá tykkum, at allir lutir mugu verða uppfyltir, sum vórðu skrivaðir í Móselógini, og *í* prophetunum, og *í* psálmunum, viðvíkjandi mær.
45 Tá opnaði hann teirra skil, at teir máttu skilja skriftirnar,
46 Og segði við teir, Soleiðis er tað skrivað, og soleiðis var tað Christi neyðugt at líða, og at rísa frá hinum deyðu hin triðja dagin:
47 Og at umvending og eftirgeving av syndum skuldi verða prædikað í hansara navni millum allar tjóðir, byrjandi í Jerusalem.
48 Og tit eru vitnir um hesi ting.
49 ¶ Og sí, eg sendi fyrijáttan Faðirs míns uppá tykkum: men dvøljið tit í Jerusalems staði, inntil tit verði útgjørdir við kraft frá tí høga.
50 ¶ Og hann leiddi teir út so langt sum til Bethaniu, og hann lyfti upp hendur sínar, og vælsignaði teir.
51 Og tað bar á, meðan hann vælsignaði teir, varð hann skildur frá teimum, og borin upp inn í himin.
52 Og teir tilbóðu hann, og vendu aftur til Jerusalem við miklari gleði:
53 Og vóru støðugt í templinum, prísandi og vælsignandi Guð. Á-měn.

EVANGELIIÐ SAMBÆRT
ST. JÓHANNESI.

KAPITUL 1

Í BYRJANINI var Orðið, og Orðið var hjá Guði, og Orðið var Guð.

2 Hin sami var í byrjanini hjá Guði.

3 Øll ting vórðu gjørd av honum; og uttan hann varð ikki nakað ting gjørt, sum varð gjørt.

4 Í honum var lív; og lívið var ljósið hjá monnum.

5 Og ljósið skínur í myrkri; og myrkrið fevndi ikki um tað.

6 ¶ Ein maður varð sendur frá Guði, hvørs navn *var* Jóhannes.

7 Hin sami kom til eitt vitni, at bera vitnisburð um Ljósið, at allir *menn* gjøgnum hann máttu trúgva.

8 Hann var ikki tað Ljósið, men *varð sendur* at bera vitnisburð um tað Ljósið.

9 *Tað* var tað sanna Ljósið, sum upplýsir hvønn mann sum kemur inn í heimin.

10 Hann var í heiminum, og heimurin varð gjørdur av honum, og heimurin kendi hann ikki.

11 Hann kom til sínar egnu, og hans egnu tóku ikki ímóti honum.

12 Men so mongum sum tóku ímóti honum, til teirra gav hann mátt at gerast synir Guðs, *enntá* til teirra sum trúgva á navn hansara:

13 Hvørjir føddir vórðu, ikki av blóði, ella av vilja kjøtsins, ella av vilja mans, men av Guði.

14 Og Orðið varð gjørt kjøt, og dvaldist okkara millum, (og vit skoðaðu dýrd hansara, dýrdina sum av tí ēingitna av Faðirinum,) fulla av náði og sannleika.

15 ¶ Jóhannes bar vitnisburð um hann, og rópti, sigandi, Hetta var hann, um hvønn eg talaði, Hann, ið kemur aftaná meg, er settur fremri enn eg: tí at hann var áðrenn eg.

16 Og av hansara fylling hava vit allir fingið, og *tað* náði fyri náði.

17 Tí at lógin varð givin við Mósesi, *men* náði og sannleiki komu við Jesusi Christi.

18 Eingin maður hevur sæð Guð á nøkrum sinni; hin ēingitni Sonurin, sum er í favni Faðirsins, hann hevur kunngjørt *hann*.

19 ¶ Og hetta er frágreiðing Jóhannesar, tá ið Jødarnir sendu prestar og Levitar frá Jerusalem at spyrja hann, Hvør ert tú?

20 Og hann játtaði, og noktaði ikki; men játtaði, Eg eri ikki Christus.

21 Og teir spurdu hann, Hvat tá? Ert tú Ē-lí-ās? Og hann sigur, Eg eri ikki. Ert tú hin propheturin? Og hann svaraði, Nei.

22 Tá søgdu teir við hann, Hvør ert tú? at vit mega geva eitt svar til teirra sum sendu okkum. Hvat sigurt tú um teg sjálvan?

23 Hann segði, Eg *eri* røddin á ēinum, rópandi í oyðimørkini, Gerið beinan veg Harrans, eins og segði propheturin Ē-sāí-ās.

24 Og teir, sum vórðu sendir, vóru av Pharisēarunum.

25 Og teir spurdu hann, og søgdu við hann, Hví doypirt tú tá, um tú veri ikki hin Christus, ella Ē-lí-ās, eiheldur hin propheturin?

26 Jóhannes svaraði teimum, sigandi, Eg doypi við vatni: men tað stendur ēin tykkara millum, hvønn tit kenna ikki;

27 Hann tað er, sum, komandi aftaná meg, er settur fremri enn eg, hvørs skótvong eg eri ikki verdur at loysa upp.

28 Hesi tingini vórðu gjørd í
Bĕth-ăb′-ă-rŭ, handan Jordan, har
Jóhannes doypti.
29 ¶ Tann næsta dagin sær
Jóhannes Jesus komandi at sær,
og sigur, Sí Guðs Lambið, sum
tekur burtur synd heimsins.
30 Hetta er hann, um hvønn
eg segði, Eftir meg kemur maður,
sum er settur fremri enn eg: tí at
hann var áðrenn eg.
31 Og eg kendi hann ikki: men
fyri at hann skuldi verða gjørdur eyðsýndur fyri Ísrael, tí eri eg
komin doypandi við vatni.
32 Og Jóhannes gav frágreiðing, sigandi, Eg sá Andan stígandi niður frá himni líkasum
ein dúgva, og hann varð verandi
uppiá honum.
33 Og eg kendi hann ikki:
men hann sum sendi meg at
doypa við vatni, hin sami segði
við meg, Uppá hvønn tú skalt
síggja Andan stígandi niður, og
verða verandi á honum, hin sami
er hann sum doypir við Halga
Andanum.
34 Og eg sá, og gav frágreiðing,
at hesin er Sonur Guðs.
35 ¶ Aftur hin næsta dagin
eftir stóð Jóhannes, og tveir av
hansara lærusveinum;
36 Og, hyggjandi uppá Jesus,
sum hann gekk, sigur hann, Sí
Guðs Lambið!
37 Og teir tveir lærusveinarnir
hoyrdu hann tala, og teir fylgdu
Jesusi.
38 Tá vendi Jesus *sær,* og sá teir
fylgjandi, og sigur við teir, Hvat
søkja tit? Teir søgdu við hann,
Rabbī, (sum vil siga, verðandi
týtt, Meistari,) hvar býrt tú?
39 Hann sigur við teir, Komið
og síggið. Teir komu og sóu hvar
hann búði, og vórðu hjá honum
tann dagin: tí at tað var um hin
tíggjunda tíman.
40 Ēin av teimum báðum sum
hoyrdu Jóhannes *tala,* og fylgdu
honum, var Andreas, bróðir Símun Pæturs.
41 Hann fyrst finnur sín egna
bróður Símun, og sigur við hann,
Vit hava funnið Mĕs-sī′-ăs˜, sum
er, verðandi týtt, Christus˜.
42 Og hann førdi hann til Jesu.
Og tá ið Jesus skoðaði hann, segði
hann, Tú ert Símun, sonur Jóna:
tú skalt verða kallaður Cē′-phăs,
sum er, við týðing, Ein steinur.
43 ¶ Hin fylgjandi dagin vildi
Jesus fara fram inn í Galilēu, og
finnur Philippus, og sigur við
hann, Fylg mær.
44 Nú, Philippus var úr Bĕthsā′-ī-dŭ, staði *teirra* Andreasar og
Pæturs.
45 Philippus finnur Nă-thān′-ă-ĕl,
og sigur við hann, Vit hava funnið
hann, um hvønn Móses í lógini,
og prophetarnir, skrivaðu, Jesus
úr Nazareth, son Josephs.
46 Og Nă-thān′-ă-ĕl segði við
hann, Kann nakað gott ting vera
komið út úr Nazareth? Philippus
sigur við hann, Kom og síggj.
47 Jesus sá Nă-thān′-ă-ĕl komandi til sín, og sigur um hann,
Skoðið ein veruligan Ísraelit, í
hvørjum einkið svik er!
48 Nă-thān′-ă-ĕl sigur við hann,
Hvaðan kennirt tú meg? Jesus
svaraði og segði við hann, Áðrenn ið Philippus kallaði teg, tá ið
tú vart undir fikutræinum, sá eg
teg.
49 Nă-thān′-ă-ĕl svaraði og sigur við hann, Rabbī, tú ert Sonur
Guðs; tú ert Kongur Ísraels.
50 Jesus svaraði og segði við
hann, Av tí at eg segði við teg, Eg
sá teg undir fikutræinum, trýrt
tú? tú skalt síggja størri ting enn
hesi.
51 Og hann sigur við hann,
Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Hereftir skulu tit síggja
himin opnan, og Guðs einglar
stígandi upp og stígandi niður
omanyvir Menniskjusonin.

KAPITUL 2

OG hin triðja dagin var eitt brúdleyp í Cāna av Galilēu; og móðir Jesu var har:
2 Og bæði Jesus var kallaður, og hansara lærusveinar, til brúdleypið.
3 Og tá ið teim vantaði vín, sigur móðir Jesu við hann, Tey hava einkið vín.
4 Jesus sigur við hana, Kvinna, hvat havi eg at gera við teg? mín tími er ikki enn komin.
5 Móðir hansara sigur við tænararnar, Hvatsumhelst hann sigur við tykkum, gerið *tað*.
6 Og har vóru sett seks vatnsker av steini, eftir skírganar-háttarlagi Jødanna, sum innihildu tvær ella tríggjar kannur stykkið.
7 Jesus sigur við teir, Fyllið vatnskerini við vatni. Og teir fyltu tey upp á tromina.
8 Og hann sigur við teir, Oysið nú úr, og berið veitslustjóranum. Og teir bóru *tað*.
9 Tá ið veitsluleiðarin hevði smakkað vatnið, sum var gjørt *til* vín, og vitsti ikki hvaðani tað var: (men tænararnir, sum oystu vatnið, vitstu;) kallaði veitslustjórin brúðgómin,
10 Og sigur við hann, Hvør maður at byrja við setur fram gott vín; og tá ið menn hava væl drukkið, tá tað sum er verri: *men* tú hevurt goymt tað góða vínið inntil nú.
11 Hesa byrjan av kraftarverkum gjørdi Jesus í Cāna av Galilēu, og eyðsýndi fram sína dýrd; og hansara lærusveinar trúðu á hann.
12 ¶ Eftir hetta fór hann oman til Că-pĕr´-nă-ŭm, hann, og móðir hansara, og brøður hansara, og lærusveinar hansara: og tey hildu áfram har ei mangar dagar.
13 ¶ Og umleypið hjá Jødunum var fyri hond, og Jesus fór niðan til Jerusalem,
14 Og fann í templinum teir sum seldu oksar og seyð og dúgvur, og vekslararnar av peningi sitandi:
15 Og tá ið hann hevði gjørt ein koyril úr smáum strongum, rak hann teir allar út úr templinum, og seyðin, og oksarnar; og stoytti út peningin hjá vekslarunum, og kastaði um koll borðini;
16 Og segði við teir sum seldu dúgvur, Takið hesi tingini hiðani; gerið ikki hús Faðirs míns *til* eitt handilsskapshús.
17 Og hansara lærusveinar mintust, at tað stóð skrivað, Vandlæti húss tíns hevur etið meg upp.
18 ¶ Jødarnir tá tóku til orða og søgdu við hann, Hvat tekin sýnirt tú okkum, við tað at tú gert hesi tingini?
19 Jesus svaraði og segði við teir, Oyðið hetta tempul, og á trimum døgum vil eg reisa tað upp.
20 Tá søgdu Jødarnir, Fjøruti og seks ár stóð hetta templið í bygging, og vilt tú reisa tað upp á trimum døgum?
21 Men hann talaði um tempul likams síns.
22 Tá ið tí hann var risin frá hinum deyðu, mintust hansara lærusveinar at hann hevði sagt hetta við teir; og teir trúðu skriftini, og orðinum sum Jesus hevði sagt.
23 ¶ Nú, tá ið hann var í Jerusalem á umleypinum, á hátíðar-*deginum,* trúðu mangir á navn hansara, tá ið teir sóu tey kraftarverkini sum hann gjørdi.
24 Men Jesus trúði seg ikki til teirra, av tí at hann kendi allar *menn,*
25 Og tørvaði ikki at nakar skuldi vitna um mann*in:* tí at hann vitsti hvat var í manni.

KAPITUL 3

TAÐ var ein maður av Pharisēarunum, nevndur Nī-cō-dē´-mŭs, ein stjórnari hjá Jødunum:
2 Tann sami kom til Jesu um

nátt*ina*, og segði við hann, Rabbī, vit vita at tú ert ein lærari, komin frá Guði: tí at eingin maður kann gera hesi kraftarverkini sum tú gert, uttan Guð veri *seg* við honum.

3 Jesus svaraði og segði við hann, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tær, Uttan ein maður verði endurføddur, kann hann ikki sjá kongadømi Guðs.

4 Nĭ-cŏ-dē´-mŭs sigur við hann, Hvussu kann ein maður verða føddur tá ið hann er gamalur? kann hann fara *fyri* aðru ferð inn í lívmóðrina hjá móður síni, og verða føddur?

5 Jesus svaraði, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tær, Uttan ein maður verði føddur av vatni og *av* Andanum, kann hann ikki koma inn í kongadømi Guðs.

6 Tað, sum er føtt av kjøtinum, er kjøt; og tað, sum er føtt av Andanum, er andi.

7 Undrast ikki, at eg segði við teg, Tit mega verða endurføddir.

8 Vindurin blæsur hvar honum lystir, og tú hoyrirt ljóðið av honum, men kanst ikki siga hvaðan hann kemur, og hvagar hann fer: soleiðis er hvør tann sum er føddur av Andanum.

9 Nĭ-cŏ-dē´-mŭs svaraði og segði við hann, Hvussu kunnu hesi tingini vera?

10 Jesus svaraði og segði við hann, Ert tú ein meistari hjá Ísrael, og veitst ikki hesi ting?

11 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tær, Vit tala tað vit vita, og vitna tað vit hava sæð; og tit taka ikki ímóti vitnisburði okkara.

12 Um eg havi sagt tykkum jarðiskar lutir, og tit trúgva ikki, hvussu skulu tit trúgva, um eg sigi tykkum *um* himinskar lutir?

13 Og eingin maður hevur stigið upp til himins, uttan hann sum kom niður frá himni, *enntá* Menniskjusonurin sum er í himni.

14 ¶ Og eins og Móses hevjaði upp ormin í oyðimørkini, enntá soleiðis má Menniskjusonurin verða hevjaður upp:

15 At hvørsumhelst *ið* trýr á hann, skuldi ikki glatast, men hava ævigt lív.

16 ¶ Tí at so elskaði Guð heimin, at hann gav sín ēingitna Son, til *tess* at hvørsumhelst, *ið* trýr á hann, skuldi ikki glatast, men hava ævigtvarandi lív.

17 Tí at Guð sendi ikki Son sín inn í heimin at fordøma heimin; men at heimurin ígjøgnum hann mátti verðið frelstur.

18 ¶ Hann, ið trýr á hann, verður ikki fordømdur: men hann, ið trýr ikki, er fordømdur longu, av tí at hann hevur ikki trúð á navn hins ēingitna Sonar Guðs.

19 Og hetta er fordømingin, at ljós er komið inn í heimin, og menn elskaðu myrkur heldur enn ljós, av tí at teirra gerðir vóru óndar.

20 Tí at hvør tann, ið ger ilt, hatar ljósið, eiheldur kemur til ljósið, at ikki hansara gerðir skuldu verða átalaðar.

21 Men hann, ið ger sannleika, kemur til ljósið, at hansara gerðir mega verða gjørdar eyðsýndar, at tær eru virkaðar í Guði.

22 ¶ Eftir hesi tingini komu Jesus og hansara lærusveinar inn í land Judæu; og har dvaldi hann við teimum, og doypti.

23 ¶ Og Jóhannes eisini doypti í Æ´-nŏn nær við Sā´-lĭm, av tí at tað var mikið vatn har: og tey komu, og vórðu doypt.

24 Tí Jóhannes var ikki enn kastaður inn í fongsul.

25 ¶ Tá reis tað upp ein spurningur ímillum *summar* av lærusveinum Jóhannesar og Jødarnar um skírgan.

26 Og teir komu til Jóhannesar, og søgdu við hann, Rabbī, hann, sum var við tær handan Jordan, til hvørs tú bart vitnis-

burð, sí, hin sami doypir, og allir *menn* koma til hansara.

27 Jóhannes svaraði og segði, Ein maður kann einkið móttaka, uttan tað verði givið honum frá himni.

28 Tit sjálvir bera mær vitnisburð, at eg segði, Eg eri ikki Christus˜, men at eg eri sendur undan honum.

29 Hann, ið hevur brúðurina, er brúðgómurin: men vinurin hjá brúðgóminum, sum stendur og hoyrir hann, fegnast mikilliga vegna rødd brúðgómsins: hesin mín fagnaður tí er uppfyltur.

30 Hann má vaksa, men eg *má* minka.

31 Hann, ið kemur omanífrá, er omanfyri allar: hann, sum er av jørðini, er jarðiskur, og talar av jørðini: hann, ið kemur frá himni, er omanfyri allar.

32 Og tað, *sum* hann hevur sæð og hoyrt, tað vitnar hann; og eingin maður tekur ímóti hansara vitnisburði.

33 Hann, sum hevur tikið ímóti hansara vitnisburði, hevur sett til innsigli hansara, at Guð er sannur.

34 Tí at hann, sum Guð hevur sent, talar orðini hjá Guði: tí at Guð gevur ikki Andan eftir máli *at honum*.

35 Faðirin elskar Sonin, og hevur givið øll ting inn í hond hansara.

36 Hann, ið trýr á Sonin, hevur ævigtvarandi lív: og hann, ið trýr ikki Syninum, skal ikki síggja lív; men Guðs vreiði verður *verandi* á honum.

KAPITUL 4

TÁ ið tí Harrin vitsti, hvussu Pharisēararnir høvdu hoyrt, at Jesus vann og doypti fleiri lærusveinar enn Jóhannes,

2 (Hóast Jesus sjálvur doypti ikki, men hansara lærusveinar,)

3 Fór hann avstað úr Judæu, og fór avstað aftur inn í Galilēu.

4 Og hann mátti neyðugt fara ígjøgnum Să-mâr´-ĭ-ŭ.

5 Tá kemur hann til ein stað av Să-mâr´-ĭ-ŭ, sum er kallaður Sȳ´-chăr, nær við *tað* stykkið av jørð sum Jákob gav til son sín Joseph.

6 Nú, brunnur Jákobs var har. Jesus tí, verandi møddur av *síni* ferð, settist soleiðis á brunnin: *og* tað var um hin sætta tíman.

7 Har kemur ein kvinna úr Să-mâr´-ĭ-ŭ at draga vatn: Jesus sigur við hana, Gev mær at drekka.

8 (Tí at hansara lærusveinar vóru farnir avstað til staðin at keypa mat.)

9 Tá sigur kvinnan úr Să-mâr´-ĭ-ŭ við hann, Hvussu er tað at tú, verandi Jødi, umbiðurt drekka frá mær, sum eri ein kvinna úr Să-mâr´-ĭ-ŭ? tí at Jødarnir hava eingi viðurskiftir við Să-măr-ĭ-tān´-ararnar.

10 Jesus svaraði og segði við hana, Um tú kendirt gávu Guðs, og hvør tað er sum sigur til tín, Gev mær at drekka; vildirt tú havt umbiðið av honum, og hann vildi havt givið tær livandi vatn.

11 Kvinnan sigur við hann, Harri, tú hevurt einkið at draga við, og brunnurin er djúpur: hvaðani frá hevurt tú tá tað livandi vatnið?

12 Ert tú størri enn faðir okkara Jákob, sum gav okkum brunnin, og drakk úr honum sjálvur, og børn hansara, og fæ hansara?

13 Jesus svaraði og segði við hana, Hvørsumhelst *ið* drekkur av hesum vatni, skal tyrsta aftur:

14 Men hvørsumhelst *ið* drekkur av tí vatni, sum eg skal geva honum, skal aldri tyrsta; men vatnið, sum eg skal geva honum, skal vera í honum ein kelda av vatni, vellandi upp inn í ævigtvarandi lív.

15 Kvinnan sigur við hann, Harri, gev mær hetta vatnið,

at eg tyrsti ikki, eiheldur komi higar at draga.
16 Jesus sigur við hana, Far, kalla mann tín, og kom higar.
17 Kvinnan svaraði og segði, Eg havi ongan mann. Jesus segði við hana, Tú hevurt væl sagt, eg havi ongan mann:
18 Tí at tú hevurt havt fimm menn; og hann, sum tú nú hevurt, er ikki maður tín: í tí segðirt tú sannliga.
19 Kvinnan sigur við hann, Harri, eg varnist at tú ert ein prophetur.
20 Okkara fedrar tilbóðu á hesum fjallinum; og tit siga, at í Jerusalem er staðið har menn áttu at tilbiðja.
21 Jesus sigur við hana, Kvinna, trúgv mær, tann tími kemur, tá ið tit skulu hvørki á hesum fjallinum, ella enn í Jerusalem, tilbiðja Faðirin.
22 Tit tilbiðja tit kenna ikki hvat: vit vita hvat vit tilbiðja: tí at frelsa er frá Jødunum.
23 Men tann tími kemur, og nú er, tá ið hinir sonnu tilbiðjararnir skulu tilbiðja Faðirin í anda og í sannleika: tí at Faðirin søkir slíkar at tilbiðja seg.
24 Guð *er* ein Andi: og teir, sum tilbiðja hann, mugu tilbiðja *hann* í anda og í sannleika.
25 Kvinnan sigur við hann, Eg veit at Mës-sĭ'-ăs kemur, sum er kallaður Christus: tá ið hann er komin, vil hann siga okkum øll ting.
26 Jesus sigur við hana, Eg, sum tali við teg, eri *hann*.
27 ¶ Og við hetta komu hansara lærusveinar, og undraðust *á* at hann talaði við kvinnuna: tó segði eingin maður, Hvat søkirt tú? ella, Hví talart tú við hana?
28 Kvinnan tá fór frá sínum vatnskeraldi, og fór sín veg inn í staðin, og sigur við menninar,
29 Komið, síggið ein mann, sum segði mær øll ting sum nakrantíð eg gjørdi: er ikki hesin Christus˜?
30 Tá fóru tey út úr staðinum, og komu at honum.
31 ¶ Í millumtíðini bóðu hansara lærusveinar hann, sigandi, Meistari, et.
32 Men hann segði við teir, Eg havi mat at eta, sum tit vita ikki um.
33 Tí søgdu lærusveinarnir hvør til annan, Hevur nakar maður borið honum *okkurt* at eta?
34 Jesus sigur við teir, Matur mín er at gera vilja hansara sum sendi meg, og at fullgera verk hansara.
35 Siga tit ikki, Enn eru fýra mánaðir, og *so* kemur heyst? sí, eg sigi tykkum, Lyftið upp eygum tykkara, og hyggið á akrarnar; tí at teir eru hvítir longu til heystar.
36 Og hann, ið sker, fær løn, og savnar ávøkst til ævigt lív: at bæði hann ið sáar, og hann ið heystar, mega fegnast saman.
37 Og herí er tað orðtakið satt, Ein sáar, og annar heystar.
38 Eg sendi tykkum at heysta tað, hvará tit einkið arbeið veittu: aðrir menn arbeiddu, og tit eru gingnir inn í teirra arbeiðir.
39 ¶ Og mangir av Să-măr-ĭ-tān'-arum tess staðar trúðu á hann vegna framsøgn kvinnunnar, sum vitnaði, Hann segði mær alt sum nakrantíð eg gjørdi.
40 So tá ið Să-măr-ĭ-tān'-ararnir vóru komnir at honum, bønaðu teir hann, at hann vildi dvølt hjá teimum: og hann varð har tveir dagar.
41 Og mangir fleiri trúðu vegna egna orð hansara;
42 Og søgdu við kvinnuna, Nú trúgva vit, ikki vegna tína framsøgn: tí at vit hava hoyrt *hann* sjálvir, og vita at hesin er veruliga Christus˜, Frelsari heimsins.

43 ¶ Nú, eftir tveir dagar fór hann avstað haðani, og fór inn í Galilēu.

44 Tí at Jesus sjálvur vitnaði, at ein prophetur hevur ongan heiður í sínum egna landi.

45 Síðan, tá ið hann var komin inn í Galilēu, tóku Galilæararnir ímóti honum, havandi sæð øll tey tingini sum hann gjørdi í Jerusalem á hátíðini: tí at teir eisini fóru til hátíðina.

46 So Jesus kom aftur inn í Cāna av Galilēu, har hann gjørdi vatnið *til* vín. Og har var ein ávísur aðalsmaður, hvørs sonur var sjúkur í Că-pĕr´-nă-ŭm.

47 Tá ið hann hoyrdi, at Jesus var komin út úr Judæu inn í Galilēu, fór hann til hansara, og bønaði hann, at hann vildi komið oman, og grøtt son sín: tí at hann lá á deyðastrá.

48 Tá segði Jesus við hann, Uttan tit síggi tekin˘ og undur˘, vilja tit ikki trúgva.

49 Aðalsmaðurin sigur við hann, Tygum, komið oman, áður enn barn mítt doyggi.

50 Jesus sigur við hann, Far tín veg; sonur tín livir. Og maðurin trúði orðinum sum Jesus hevði talað við hann, og hann fór sín veg.

51 Og sum hann var nú farandi oman, møttu honum hansara tænarar, og taldu *honum,* sigandi, Sonur tín livir.

52 Tá fregnaði hann av teimum tíman, tá ið hann byrjaði at batna. Og teir søgdu við hann, Í gjár, við hin sjeynda tíman, fór hitasóttin frá honum.

53 So faðirin vitsti, at *tað var* við hin sama tíman, í hvørjum Jesus segði við hann, Sonur tín livir: og sjálvur hann trúði, og alt hús hansara.

54 Hetta *er* aftur hitt annað kraftarverkið *sum* Jesus gjørdi, tá ið hann var komin út úr Judæu inn í Galilēu.

KAPITUL 5

EFTIR hetta var tað ein høgtíð hjá Jødunum; og Jesus fór niðan til Jerusalem.

2 Nú, tað er í Jerusalem við seyða*marknaðin* ein hylur, sum verður kallaður á hini Hebrāisku tungu Bĕth-ĕs´-dă, havandi fimm súlnagangir.

3 Í hesum lá ein mikil fjøld av ússaligum fólki, av blindum, høltum, visnaðum, bíðandi eftir røringini av vatninum.

4 Tí ein eingil fór niður um ávísa tíð inn í hylin, og órógvaði vatnið: hvørsumhelst *ið* tá fyrstur eftir órógvingina av vatninum steig í, varð gjørdur heilur av hvørjumsumhelst sjúkdómi hann hevði.

5 Og ein ávísur maður var har, sum hevði ein veikleika tríati og átta ár.

6 Tá ið Jesus sá hann liggja, og vitsti at hann hevði verið nú í langa tíð *í teirri støðuni,* sigur hann við hann, Vilt tú verða gjørdur heilur?

7 Tann ússaligi maðurin svaraði honum, Tygum, eg havi ongan mann, tá ið vatnið verður órógvað, at seta meg inn í hylin: men meðan eg komi, stígur ein annar niður undan mær.

8 Jesus sigur við hann, Rís *upp,* tak upp song tína, og gakk.

9 Og í stundini varð maðurin gjørdur heilur, og tók upp song sína, og gekk: og á tí sama deginum var sabbaturin.

10 ¶ Jødarnir tessvegna søgdu við hann sum varð lektur, Tað er sabbatsdagurin: tað er ikki lógligt hjá tær at bera song *tína.*

11 Hann svaraði teimum, Hann, sum gjørdi meg heilan, hin sami segði við meg, Tak upp song tína, og gakk.

12 Tá spurdu teir hann, Hvør maður er tað sum segði við teg, Tak upp song tína, og gakk?

13 Og hann, sum varð grøddur, vitsti ikki hvør tað var: tí at Jesus hevði havt seg undan, ein mannfjøld verandi á *tí* staðnum.

14 Síðan finnur Jesus hann í templinum, og segði við hann, Sí, tú ert gjørdur heilur: synda ikki meira, at ikki eitt verri ting komi at tær.

15 Maðurin fór avstað, og segði Jødunum, at tað var Jesus sum hevði gjørt hann heilan.

16 Og tí søktu Jødarnir at Jesusi, og royndu at bana honum, av tí at hann hevði gjørt hesi tingini á sabbatsdeginum.

17 ¶ Men Jesus svaraði teimum, Faðir mín arbeiðir higartil, og eg arbeiði.

18 Tí royndu Jødarnir tess meira at drepa hann, av tí at hann ikki einans hevði brotið sabbatin, men segði eisini at Guð var Faðir sín, gerandi seg sjálvan javnan við Guð.

19 Jesus tá tók til orða og segði við teir, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Sonurin kann einkið gera av sær sjálvum, uttan tað *sum* hann sær Faðirin gera: tí at hvørji ting sumhelst *ið* hann ger, hesi eisini ger Sonurin líkaleiðis.

20 Tí at Faðirin elskar Sonin, og sýnir honum øll ting sum sjálvur hann ger: og hann vil sýna honum størri verk enn hesi, at tit mega undrast.

21 Tí at eins og Faðirin reisir upp hini deyðu, og livandiger *tey;* enntá soleiðis livandiger Sonurin hvønn hann vil.

22 Tí at Faðirin dømir ongan mann, men hevur litið Syninum allan dóm til:

23 At allir *menn* skuldu æra Sonin, enntá sum teir æra Faðirin. Hann, ið ærir ikki Sonin, ærir ikki Faðirin sum hevur sent hann.

24 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Hann, ið hoyrir orð mítt, og trýr á hann sum sendi meg, hevur ævigtvarandi lív, og skal ikki koma inn í fordøming; men er farin yvir frá deyða til lív.

25 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Tann tími kemur, og nú er, tá ið tey deyðu skulu hoyra rødd Guðs Sonar: og tey, sum hoyra, skulu liva.

26 Tí at eins og Faðirin hevur lív í sær sjálvum; soleiðis hevur hann givið til Sonin at hava lív í sær sjálvum;

27 Og hevur givið honum myndugleika at halda dóm eisini, av tí at hann er Menniskjusonurin.

28 Undrist ikki á hetta: tí at tann tími kemur, í hvørjum øll, sum eru í grøvunum, skulu hoyra rødd hansara,

29 Og skulu koma fram; tey, sum hava gjørt gott, til lívs uppreisnar; og tey, sum hava gjørt ilt, til heldømingar uppreisnar.

30 Eg kann av mær sjálvum einkið gera: eins og eg hoyri, dømi eg: og dómur mín er rættvísur; tí at eg søki ikki mín egna vilja, men vilja Faðirsins sum hevur sent meg.

31 Um eg beri vitnisburð um meg sjálvan, er mín vitnisburður ikki sannur.

32 ¶ Tað er ein annar sum ber vitnisburð um meg; og eg veit, at tann vitnisburðurin, sum hann vitnar um meg, er sannur.

33 Tit sendu til Jóhannesar, og hann bar sannleikanum vitnisburð.

34 Men eg taki ikki ímóti vitnisburði frá manni: men hesi tingini sigi eg, at tit máttu verðið frelstir.

35 Hann var eitt brennandi og eitt skínandi ljós: og tit vóru viljugir í eitt tíðarskeið at fegnast í ljósi hansara.

36 ¶ Men eg havi størri vitnisburð enn *tann* av Jóhannesi: tí at verkini, sum Faðirin hevur givið mær at fullgera, tey somu verkini sum eg geri, bera vitnisburð um meg, at Faðirin hevur sent meg.

37 Og Faðirin sjálvur, sum hevur sent meg, hevur borið vitnisburð um meg. Tit hava hvørki hoyrt hansara rødd á nøkrum sinni, ella sæð hansara skap.
38 Og tit hava ikki orð hansara verandi í tykkum: tí hvørjum hann hevur sent, honum trúgva tit ikki.
39 ¶ Kannið skriftirnar; tí at í teimum halda tit, at tit hava ævigt lív: og tær eru tær sum vitna um meg.
40 Og tit vilja ikki koma til mín, at tit máttu havt lív.
41 Eg taki ikki ímóti heiðuri frá monnum.
42 Men eg kenni tykkum, at tit hava ikki Guðs kærleika í tykkum.
43 Eg eri komin í navni Faðirs míns, og tit taka ikki ímóti mær: um ein annar skal koma í sínum egna navni, honum vilja tit taka ímóti.
44 Hvussu kunnu tit trúgva, sum taka ímóti heiðuri hvør frá øðrum, og søkja ikki tann heiður sum *kemur* frá Guði einans?
45 Hugsið ikki, at eg vil ákæra tykkum fyri Faðirinum: tað er *ēin* sum ákærir tykkum, *enntá* Móses, á hvønn tit troysta.
46 Tí at høvdu tit trúð Mósesi, vildu tit havt trúð mær: tí at hann skrivaði um meg.
47 Men um tit trúgvi ikki skriftum hansara, hvussu skulu tit trúgva orðum mínum?

KAPITUL 6

EFTIR hesi tingini fór Jesus yvirum Galilēu-sjógvin, sum er Tī-bē´-rī-ās-*sjógvurin*.
2 Og ein mikil mannfjøld fylgdi honum, av tí at tey sóu hansara kraftarverk˘ sum hann gjørdi á teimum ið vóru sjúkufongd.
3 Og Jesus fór niðan á eitt fjall, og har settist hann við lærusveinum sínum.
4 Og umleypið, ein høgtíð hjá Jødunum, var í nánd.
5 ¶ Tá ið Jesus tá lyfti upp eygum *sínum,* og sá eitt mikið samlag koma at sær, sigur hann við Philippus, Hvaðan skulu vit keypa breyð, at hesir mega eta?
6 Og hetta segði hann til at royna hann: tí at sjálvur hann vitsti hvat hann vildi gera.
7 Philippus svaraði honum, Tvey hundrað denara virði av breyði er ikki nóg mikið hjá teimum, at hvør *og* ēin av teimum kann fáa eitt sindur.
8 Ēin av hansara lærusveinum, Andreas, bróðir Símun Pæturs, sigur við hann,
9 Tað er ein smádrongur her, sum hevur fimm byggbreyð, og tveir smáfiskar: men hvat eru tey millum so mong?
10 Og Jesus segði, Fáið menninar *at* setast niður. Nú, tað var mikið gras á staðnum. So menninir settust niður, umleið fimm túsund í tali.
11 Og Jesus tók breyðini; og tá ið hann hevði veitt tøkkir, deildi hann út til lærusveinanna, og lærusveinarnir til teirra sum setstir vóru niður; og somuleiðis av fiskunum, so mikið sum teir vildu.
12 Tá ið teir vóru mettaðir, segði hann við lærusveinar sínar, Savnið upp molarnar sum eru eftir, at einkið verði mist.
13 Tí savnaðu teir *teir* saman, og fyltu tólv tægur við molunum av teimum fimm byggbreyðunum, sum vóru eftir yvir og uppum hjá teimum sum høvdu etið.
14 Teir menninir, tá ið teir høvdu sæð kraftarverkið sum Jesus gjørdi, tá søgdu, Hetta er av sonnum hin prophēturin sum skuldi koma inn í heimin.
15 ¶ Tá ið Jesus tí varnaðist at teir vildu koma og taka hann við valdi, at gera hann *til* kong,

fór hann avstað aftur á eitt fjall sjálvur aleinaur.

16 Og tá ið kvøld var *nú* komið, fóru hansara lærusveinar oman at sjónum,

17 Og fóru inn í ein bát, og fóru yvirum sjógvin ímóti Că-pĕr´-nă-ŭm. Og tað var nú myrkt, og Jesus var ikki komin til teirra.

18 Og sjógvurin reistist, uppá grund av einum miklum vindi sum blásti.

19 So tá ið teir høvdu róð umkring fimm og tjúgu ella tríati stádiur, síggja teir Jesus, gangandi á sjógvinum, og nærkandi bátinum: og teir vórðu ræddir.

20 Men hann sigur við teir, Tað eri eg; verið ikki ræddir.

21 Tá tóku teir viljugani ímóti honum inn í bátin: og alt fyri eitt var báturin at landinum, hvagar teir fóru.

22 ¶ Tann fylgjandi dagin, tá ið fólkið, sum stóð hīnumegin sjógvin, sá, at tað var eingin annar bátur har, uttan tann, inn í hvønn hansara lærusveinar vóru farnir, og at Jesus fór ikki við sínum lærusveinum inn í bátin, men *at* hansara lærusveinar vóru farnir avstað einsamallir;

23 (Hvussu enn er, tað komu aðrir bátar frá Tī-bĕ´-rī-ăs, nær tí staðnum har teir ótu breyð, eftir at Harrin hevði veitt tøkkir:)

24 Tá ið fólkið tí sá, at Jesus var ikki har, eiheldur hansara lærusveinar, tóku tey eisini bátsføri, og komu til Că-pĕr´-nă-ŭm, søkjandi eftir Jesusi.

25 Og tá ið tey høvdu funnið hann hīnumegin sjógvin, søgdu tey við hann, Rabbī, nær komst tú higar?

26 Jesus svaraði teimum og segði, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Tit søkja meg, ikki av tí at tit sóu kraftarverkini, men av tí at tit ótu av breyðunum, og vórðu mettað.

27 Strevist ikki fyri tann matin sum ferst, men fyri tann matin sum varir við til ævigtvarandi lív, sum Menniskjusonurin skal geva tykkum: tí at hann hevur Guð Faðirin innsiglað.

28 Tá søgdu tey við hann, Hvat skulu vit gera, at vit máttu virkað verkini hjá Guði?

29 Jesus svaraði og segði við tey, Hetta er verk Guðs, at tit trúgvi á hann sum hann hevur sent.

30 Tey søgdu tí við hann, Hvat tekin sýnirt tú tá, at vit mega síggja, og trúgva tær? hvat virkart tú?

31 Okkara fedrar ótu măn´-nă í oyðimørkini; sum skrivað stendur, Hann gav teim breyð frá himni at eta.

32 Tá segði Jesus við tey, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Móses gav tykkum ikki tað breyðið frá himni; men Faðir mín gevur tykkum hitt sanna breyðið frá himni.

33 Tí at breyð Guðs er hann sum kemur niður frá himni, og gevur heiminum lív.

34 Tá søgdu tey við hann, Harri, ævirmeir gev okkum hetta breyðið.

35 Og Jesus segði við tey, Eg eri lívsins breyð: hann, ið kemur til mín, skal aldri hungra; og hann, ið trýr á meg, skal aldri tyrsta.

36 Men eg segði við tykkum, At tit eisini hava sæð meg, og trúgva ikki.

37 Alt, sum Faðirin gevur mær, skal koma til mín; og hann, sum kemur til mín, vil eg á ongan vís kasta út.

38 Tí at eg kom niður frá himni, ikki at gera mín egna vilja, men vilja hansara sum sendi meg.

39 Og hetta er vilji Faðirsins, sum hevur sent meg, at av øllum, sum hann hevur givið mær, skuldi eg einkið missa, men skuldi reisa tað upp aftur á evsta degi.

40 Og hetta er vilji hansara sum sendi meg, at hvør tann ið sær Sonin, og trýr á hann, má hava ævigtvarandi lív: og eg vil reisa hann upp á evsta degi.

41 Tá knarraðu Jødarnir inn á hann, av tí at hann segði, Eg eri tað breyðið sum kom niður frá himni.

42 Og teir søgdu, Er ikki hetta Jesus, sonur Jósephs, hvørs faðir og móður vit kenna? hvussu er tað tá at hann sigur, Eg kom niður frá himni?

43 Jesus tessvegna svaraði og segði við teir, Knarrið ikki tykkara millum.

44 Eingin maður kann koma til mín, uttan Faðirin, sum hevur sent meg, dragi hann: og eg vil reisa hann upp á evsta degi.

45 Skrivað stendur í prophetunum, Og teir skulu verða allir lærdir av Guði. Hvør maður, tessvegna, sum hevur hoyrt, og hevur lært av Faðirinum, kemur til mín.

46 Ikki at nakar maður hevur sæð Faðirin, uttan hann sum er av Guði, hann hevur sæð Faðirin.

47 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Hann, ið trýr á meg, hevur ævigtvarandi lív.

48 Eg eri tað lívsins breyðið.

49 Tykkara fedrar ótu măn´-nă í oyðuni, og eru deyðir.

50 Hetta er breyðið sum kemur niður frá himni, at ein maður má eta harav, og ikki doyggja.

51 Eg eri hitt livandi breyðið, sum kom niður frá himni: um nakar maður eti av hesum breyði, hann skal liva um ævir: og breyðið, sum eg vil geva, er kjøt mítt, sum eg vil geva fyri lív heimsins.

52 Jødarnir tí stríddu sín ámillum, sigandi, Hvussu kann hesin maðurin geva okkum kjøt *sítt* at eta?

53 Tá segði Jesus við teir, Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum, Uttan tit eti kjøt Menniskjusonarins, og drekki blóð hans, hava tit einkið lív í tykkum.

54 Hvør*ið*enn etur kjøt mítt, og drekkur blóð mítt, hevur ævigt lív; og eg vil reisa hann upp á evsta degi.

55 Tí at kjøt mítt er rættur matur, og blóð mítt er rættur drykkur.

56 Hann ið etur kjøt mítt, og drekkur blóð mítt, dvølist í mær, og eg í honum.

57 Eins og hin livandi Faðirin hevur sent meg, og eg livi av Faðirinum: soleiðis hann sum etur meg, enntá hann skal liva av mær.

58 Hetta er tað breyðið sum kom niður frá himni: ikki eins og tykkara fedrar ótu măn´-nă, og eru deyðir: hann, ið etur av hesum breyði, skal liva um ævir.

59 Hesi tingini segði hann í sýnagoguni, sum hann frálærdi í Că-pĕr´-nă-ŭm.

60 Mangir tessvegna av hansara lærusveinum, tá ið teir høvdu hoyrt *hetta,* søgdu, Hetta er ein hørð framsøgn; hvør kann hoyra hana?

61 Tá ið Jesus vitsti í sær sjálvum, at hansara lærusveinar knarraðu yvir tað, segði hann við teir, Gevur hetta tykkum meinboga?

62 *Hvat* og um tit skulu síggja Menniskjusonin stíga upp har hann var áður?

63 Tað er andin sum lívgar; kjøtið gagnar einkið: orðini sum eg tali innat tykkum, *tey* eru andi, og *tey* eru lív.

64 Men tað eru summir av tykkum sum trúgva ikki. Tí at Jesus vitsti frá byrjanini, hvørjir teir vóru sum trúðu ikki, og hvør skuldi svíkja hann.

65 Og hann segði, Tí segði eg við tykkum, at eingin maður kann koma til mín, uttan tað var givið honum av Faðir mínum.

66 ¶ Frá teirri *tíð* fóru mangir av hansara lærusveinum tilbakar, og gingu ikki meira við honum.
67 Tá segði Jesus við teir tólv, Vilja tit eisini fara burtur?
68 Símun Pætur tá svaraði honum, Harri, til hvørs skulu vit fara? tú hevurt orðini av ævigum lívi.
69 Og vit trúgva og eru vísir *í*, at tú ert hin Christus, Sonur hins livandi Guðs.
70 Jesus svaraði teimum, Havi eg ikki útvalt tykkum tólv, og ēin av tykkum er ein djevul?
71 Hann talaði um Judas Iskariot, *son* Símunar: tí at hann tað var ið skuldi svíkja hann, verandi ēin av teimum tólv.

KAPITUL 7

EFTIR hesi tingini gekk Jesus í Galilēu: tí at hann vildi ikki ganga í Jøda-umráði, av tí at Jødarnir søktu at drepa hann.
2 Men tabernakla-hátíðin hjá Jødunum var fyri hond.
3 Hansara brøður tí søgdu við hann, Far avstað hiðani, og far inn í Judǣu, at tínir lærusveinar eisini mega síggja tey verk sum tú gert.
4 Tí at *tað er* eingin maður *sum* ger nakað ting í loyndum, og sjálvur hann søkir at verða kendur opinlýsliga. Um tú geri hesi tingini, sýn teg fyri heiminum.
5 Tí at eiheldur hansara brøður trúðu á hann.
6 Tá segði Jesus við teir, Mín tíð er ikki enn komin: men tykkara tíð er altíð tilreiðar.
7 Heimurin kann ikki hata tykkum; men meg hatar hann, av tí at eg vitni um hann, at hansara verk eru ónd.
8 Farið tit niðan til hesa hátíðina: eg fari ikki niðan enn til hesa hátíðina; tí at mín tíð er ikki enn fult komin.
9 Tá ið hann hevði sagt hesi orðini við teir, varð hann *verandi enn* í Galilēu.
10 ¶ Men tá ið hansara brøður vóru farnir niðan, tá fór hann eisini niðan til hátíðina, ikki opinlýsliga, men sum var tað í loyndum.
11 Tá søktu Jødarnir hann á hátíðini, og søgdu, Hvar er hann?
12 Og har var mikil mutlan millum fólkið viðvíkjandi honum: tí at summi søgdu, Hann er ein góður maður: onnur søgdu, Nei; men hann villleiðir fólkið.
13 Hvussu enn er, eingin maður talaði opinlýsligani um hann, av ótta fyri Jødunum.
14 ¶ Nú, um miðja hátíðina fór Jesus niðan í templið, og frálærdi.
15 Og Jødarnir undraðust, sigandi, Hvussu kennir hesin maður bókstavir, havandi aldri lært?
16 Jesus svaraði teimum, og segði, Mín Guðslæra er ikki mín, men hansara sum sendi meg.
17 Um nakar maður vilji gera vilja hansara, hann skal vita av Guðslæruni, hvørt hon veri *seg* av Guði, ella *hvørt* eg tali av mær sjálvum.
18 Hann, ið talar av sær sjálvum, søkir sína egnu dýrd: men hann, ið søkir dýrd hansara sum sendi hann, hin sami er sannur, og eingin órættvísi er í honum.
19 Gav ikki Móses tykkum lógina, og *tó* heldur eingin av tykkum lógina? Hví liggja tit úti eftir at drepa meg?
20 Fólkið svaraði og segði, Tú hevurt ein djevul: hvør liggur úti eftir at drepa teg?
21 Jesus svaraði og segði við tey, Eg havi gjørt ēitt verk, og tit øll undrast.
22 Móses tessvegna gav tykkum umskering; (ikki av tí at hon er av Mósesi, men av fedrunum;) og tit á sabbatsdegnum umskera ein mann.
23 Um maður á sabbatsdeginum móttaki umskering, *fyri* at Móselógin skuldi ei verðið brot-

in; eru tit firtnir inná meg, av tí at eg havi gjørt ein mann hvørt vet heilan á sabbatsdegnum?

24 Dømið ikki samsvarandi við útsjóndina, men dømið rættvísan dóm.

25 Tá søgdu summir av teimum úr Jerusalem, Er ikki hetta hann, hvønn teir søkja at drepa?

26 Men sí, hann talar djarvliga, og teir siga einkið við hann. Vita stjórnararnir veruliga, at hesin er sjálvasti Christus?

27 Hvussu enn er, vit kenna henda mann, hvaðan hann er: men tá ið Christus kemur, veit eingin maður hvaðan hann er.

28 Tá rópti Jesus í templinum, sum hann frálærdi, sigandi, Tit bæði kenna meg, og tit vita hvaðan eg eri: og eg eri ikki komin av mær sjálvum, men hann, sum sendi meg, er sannur, hvønn tit kenna ikki.

29 Men eg kenni hann: tí at eg eri frá honum, og hann hevur sent meg.

30 Tá royndu teir at taka hann: men eingin maður legði hendur á hann, av tí at hansara tími var ikki enn komin.

31 Og mong av fólkunum trúðu á hann, og søgdu, Tá ið Christus kemur, vil hann gera fleiri kraftarverk enn hesi sum hesin *maðurin* hevur gjørt?

32 ¶ Pharisēararnir hoyrdu at fólkið mutlaði slík ting viðvíkjandi honum; og Pharisēararnir og teir fremstu prestarnir sendu tænastumenn at taka hann.

33 Tá segði Jesus við teir, Enn eina lítla stund eri eg hjá tykkum, og *so* fari eg til hansara sum sendi meg.

34 Tit skulu søkja meg, og skulu ikki finna *meg:* og har *ið* eg eri, *hagar* kunnu tit ikki koma.

35 Tá søgdu Jødarnir sín ámillum, Hvagar vil hann fara, at vit skulu ikki finna hann? vil hann fara til hinar umspjaddu millum Heidninganna, og læra Heidningarnar?

36 Hvørs*háttar* framsøgn er hetta sum hann segði, Tit skulu søkja meg, og skulu ikki finna *meg:* og har *ið* eg eri, *hagar* kunnu tit ikki koma?

37 Á tí síðsta degnum, tí stóra *degnum* av hátíðini, stóð Jesus og rópaði, sigandi, Um nakar maður tyrsti, lat hann koma til mín, og drekka.

38 Hann, ið trýr á meg, eins og skriftin hevur sagt, út úr hansara búki skulu floyma áir av livandi vatni.

39 (Men hetta talaði hann um Andan, sum teir, sum trúgva á hann, skuldu móttaka: tí at Halgi Andin var ikki enn *givin;* av tí at Jesus var ikki enn dýrðmettur.)

40 ¶ Mong av fólkunum tessvegna, tá ið tey hoyrdu hesa framsøgn, søgdu, Av sonnum, hesin er Prophēturin.

41 Onnur søgdu, Hetta er Christus˜. Men summi søgdu, Skal Christus koma út úr Galilēu?

42 Hevur ikki skriftin sagt, At Christus kemur av sáði Dávids, og út úr býi Bethlehems, har Dávid var?

43 So har varð ein sundurdeiling millum fólkið uppá grund av honum.

44 Og summir av teimum vildu havt tikið hann; men eingin maður legði hendur á hann.

45 ¶ Tá komu tænastumenninir til fremstu prestarnar og Pharisēararnar; og teir søgdu við teir, Hví eru tit ikki komnir við honum?

46 Tænastumenninir svaraðu, Aldri maður talaði líka *sum* hesin maður.

47 Tá svaraðu teimum Pharisēararnir, Eru tit eisini villleiddir?

48 Hava nakrir av stjórnarunum ella av Pharisēarunum trúð á hann?

49 Men hetta fólkið, sum kennir ikki lógina, eru bølbiðin.
50 Nĭ-cŏ-dē´-mŭs sigur við teir, (hann sum kom til Jesu um náttina, verandi ēin teirra,)
51 Dømir okkara lóg *nakran* mann, áðrenn hon hoyri hann, og viti hvat hann ger?
52 Teir svaraðu og søgdu við hann, Ert tú eisini úr Galilēu? Kanna, og hygg: tí at úr Galilēu rísur eingin prophetur.
53 Og hvør maður fór at sínum egna húsi.

KAPITUL 8

JESUS fór til Olivinfjallið.
2 Og árla um morgunin kom hann aftur inn í templið, og alt fólkið kom til hansara; og hann settist niður, og lærdi tey.
3 Og teir skriftlærdu og Pharisēararnir førdu til hansara eina kvinnu, tikna í hordómi; og tá ið teir høvdu sett hana í miðjuna,
4 Siga teir við hann, Meistari, henda kvinna varð tikin í hordómi, í sjálvastu gerðini.
5 Nú, Móses í lógini beyð okkum, at slíkar skuldu verða steinaðar: men hvat sigurt tú?
6 Hetta teir søgdu, freistandi hann, at teir máttu hava til at ákæra hann. Men Jesus heyk niður, og við *sínum* fingri skrivaði á jørðina, *sum um hann hoyrdi teir ei.*
7 So tá ið teir hildu áfram at spyrja hann, rætti hann upp seg sjálvan, og segði við teir, Hann, sum er uttan synd tykkara millum, lat hann fyrst kasta ein stein eftir henni.
8 Og aftur heyk hann niður, og skrivaði á jørðina.
9 Og teir sum hoyrdu *tað,* verðandi kendir skyldigir av *síni egnu* samvitsku, fóru út ēin eftir ēinum, byrjandi við tí elsta, *alt* at tí síðsta: og Jesus varð eftir einsamallur, og kvinnan standandi í miðjuni.
10 Tá ið Jesus hevði rætt upp seg sjálvan, og sá ongan uttan kvinnuna, segði hann við hana, Kvinna, hvar eru teir tínir ákærarar? hevur eingin maður fordømt teg?
11 Hon segði, Eingin maður, Harri. Og Jesus segði við hana, Eiheldur eg fordømi teg: far, og synda ikki meira.
12 ¶ Tá talaði Jesus aftur til teirra, sigandi, Eg eri ljós heimsins: hann, ið fylgir mær, skal ikki ganga í myrkri, men skal hava lívsins ljós.
13 Pharisēararnir tí søgdu við hann, Tú gevurt frágreiðing um teg sjálvan; tín frágreiðing er ikki sonn.
14 Jesus svaraði og segði við teir, Tó *at* eg gevi frágreiðing um meg sjálvan, *tó* er frágreiðing mín sonn: tí at eg veit hvaðan eg kom, og hvagar eg fari; men tit kunnu ikki siga hvaðan eg komi, og hvagar eg fari.
15 Tit døma eftir kjøtinum; eg dømi ongan mann.
16 Og tó um eg dømi, dómur mín er sannur: tí at eg eri ikki einsamallur, men eg og Faðirin sum sendi meg.
17 Tað stendur eisini skrivað í tykkara lóg, at vitnisburðurin av tveim monnum er sannur.
18 Eg eri ēin sum beri vitnisburð um meg sjálvan, og Faðirin, sum sendi meg, ber vitnisburð um meg.
19 Tá søgdu teir við hann, Hvar er Faðir tín? Jesus svaraði, Tit hvørki kenna meg, ella Faðir mín: um tit høvdu kent meg, skuldu tit havt kent Faðir mín eisini.
20 Hesi orðini talaði Jesus í skattkamarinum, sum hann frálærdi í templinum: og eingin maður legði hendur á hann; tí at hansara tími var ikki enn komin.
21 Tá segði Jesus aftur við teir,

Eg fari mín veg, og tit skulu søkja meg, og skulu doyggja í tykkara syndum: hvagar eg fari, kunnu tit ikki koma.

22 Tá søgdu Jødarnir, Vil hann drepa seg? av tí at hann sigur, Hvagar eg fari, kunnu tit ikki koma.

23 Og hann segði við teir, Tit eru úr neðra; eg eri úr erva: tit eru av hesum heimi; eg eri ikki av hesum heimi.

24 Eg segði tessvegna við tykkum, at tit skulu doyggja í tykkara syndum: tí at um tit trúgvi ikki at eg eri *hann,* skulu tit doyggja í tykkara syndum.

25 Tá søgdu teir við hann, Hvør ert tú? Og Jesus sigur við teir, Enntá *hin sami* sum eg segði við tykkum frá byrjanini.

26 Eg havi mong ting at siga og at døma um tykkum: men hann, sum sendi meg, er sannur; og eg tali til heimin tey tingini sum eg havi hoyrt av honum.

27 Teir skiltu ikki, at hann talaði til teirra um Faðirin.

28 Tá segði Jesus við teir, Tá ið tit hava lyft upp Menniskjusonin, tá skulu tit vita at eg eri *hann,* og *at* eg geri einkið av mær sjálvum; men eins og Faðir mín hevur lært meg, tali eg hesi tingini.

29 Og hann, sum sendi meg, er við mær: Faðirin hevur ikki eftirlatið meg einsamallan; tí at eg geri altíð tey tingini sum tokna honum.

30 Sum hann talaði hesi orðini, trúðu mangir á hann.

31 Tá segði Jesus til teir Jødar sum trúðu á hann, Um tit haldi á fram í orði mínum, *tá* eru tit mínir lærusveinar í roynd *og veru;*

32 Og tit skulu kenna sannleikan, og sannleikin skal gera tykkum fríar.

33 ¶ Teir svaraðu honum, Vit eru sáð Ábrahams, og vóru aldri í trældómi hjá nøkrum manni: hvussu sigurt tú, Tit skulu verða gjørdir fríir?

34 Jesus svaraði teimum, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Hvørsumhelst *ið* fremur synd, er tænarin hjá synd.

35 Og tænarin verður ikki *verandi* í húsinum um ævir: *men* Sonurin verður *verandi* ævir.

36 Um tí Sonurin skal gera tykkum fríar, skulu tit vera fríir í roynd *og veru.*

37 Eg veit at tit eru sáð Ábrahams; men tit søkja at drepa meg, av tí at mítt orð hevur einkið pláss í tykkum.

38 Eg tali tað sum eg havi sæð hjá Faðir mínum: og tit gera tað sum tit hava sæð hjá faðir tykkara.

39 Teir svaraðu og søgdu við hann, Ábraham er faðir okkara. Jesus sigur við teir, Um tit vóru børn Ábrahams, høvdu tit gjørt verk˘ Ábrahams.

40 Men nú søkja tit at drepa meg, ein mann sum hevur sagt tykkum sannleikan, sum eg havi hoyrt av Guði: hetta gjørdi ikki Ábraham.

41 Tit gera gerningar faðirs tykkara. Tá søgdu teir til hansara, Vit veri ikki føddir úr siðloysi; vit hava ein Faðir, *enntá* Guð.

42 Jesus segði við teir, Um Guð var tykkara Faðir, vildu tit elskað meg: tí at eg gekk fram og kom frá Guði; eiheldur kom eg av mær sjálvum, men hann sendi meg.

43 Hví skilja tit ikki mína talu? *enntá* av tí at tit kunnu ikki hoyra mítt orð.

44 Tit eru av faðir *tykkara* djevlinum, og lystir faðirs tykkara vilja tit gera. Hann var ein myrðari frá byrjanini, og varð ikki *verandi* í sannleikanum, av tí at tað er eingin sannleiki í honum. Tá ið hann talar eina lygn, talar hann av sínum egna: tí at hann er ein lygnari, og faðirin at henni.

45 Og av tí at eg sigi *tykkum* sannleikan, trúgva tit mær ikki.
46 Hvør av tykkum sannførir meg um synd? Og um eg sigi sannleikan, hví trúgva tit mær ikki?
47 Hann, sum er av Guði, hoyrir orðini hjá Guði: tit tessvegna hoyra *tey* ikki, av tí at tit eru ikki av Guði.
48 Tá svaraðu Jødarnir, og søgdu við hann, Siga vit ikki væl, at tú ert ein Sǎ-măr-ĭ-tăn´-ari, og hevurt ein djevul?
49 Jesus svaraði, Eg havi ikki ein djevul; men eg æri Faðir mín, og tit vanæra meg.
50 Og eg søki ikki mína egnu dýrd: ēin er sum søkir og dømir.
51 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Um ein maður varðveiti mína framsøgn, hann skal aldri sjá deyða.
52 Tá søgdu Jødarnir við hann, Nú vita vit at tú hevurt ein djevul. Ábraham er deyður, og prophetarnir; og tú sigurt, Um ein maður varðveiti mína framsøgn, hann skal aldri smakka av deyða.
53 Ert tú størri enn faðir okkara Ábraham, sum er deyður? og prophetarnir eru deyðir: hvønn gert tú teg sjálvan *til?*
54 Jesus svaraði, Um eg æri meg sjálvan, er æra mín einkið: tað er Faðir mín sum ærir meg; um hvønn tit siga, at hann er Guð tykkara:
55 Tó hava tit ikki kent hann; men eg kenni hann: og um eg skuldi sagt, Eg kenni hann ikki, hevði eg verið ein lygnari, líkt við tykkum: men eg kenni hann, og varðveiti hansara framsøgn.
56 Tykkara faðir, Ábraham, fegnaðist at síggja mín dag: og hann sá *hann,* og varð glaður.
57 Tá søgdu Jødarnir við hann, Tú ert ikki enn fimti ára gamalur, og hevurt tú sæð Ábraham?
58 Jesus segði við teir, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Áður enn Ábraham varð, eg eri.
59 Tá tóku teir upp steinar at kasta eftir honum: men Jesus fjaldi seg, og fór út úr templinum, farandi ígjøgnum teirra mittu, og soleiðis fór framvið.

KAPITUL 9

OG, sum *Jesus* fór framvið, sá hann ein mann sum var blindur frá *síni* føðing.
2 Og hansara lærusveinar spurdu hann, sigandi, Meistari, hvør hevur syndað, hesin maður, ella foreldur hansara, at hann varð føddur blindur?
3 Jesus svaraði, Hvørki hevur hesin maður syndað, ella foreldur hansara: men *fyri* at verkini hjá Guði skuldu verða gjørd eyðsýnd í honum.
4 Eg má virka verkini hjá honum sum sendi meg, meðan dagur er: náttin kemur, tá ið eingin maður kann virka.
5 So leingi sum eg eri í heiminum, eri eg ljós heimsins.
6 Tá ið hann svá hevði talað, spýtti hann á jørðina, og gjørdi leir úr spýttinum, og hann salvaði eyguni hjá tí blinda manninum við leirinum,
7 Og segði við hann, Far, tváa *tær* í Sī´-lŏ-ăm-s-hylinum, (sum er, viðˆ týðing, Sendur.) Hann fór tí sín veg, og tvó *sær,* og kom síggjandi.
8 ¶ Grannarnir tessvegna, og teir sum áður høvdu sæð hann, at hann var blindur, søgdu, Er ikki hetta hann sum sat og biddaði?
9 Summir søgdu, Hetta er hann: aðrir *søgdu,* Hann er líkur honum: *men* hann segði, Eg eri *hann.*
10 Tí søgdu teir við hann, Hvussu vórðu eygu tíni opnað?
11 Hann svaraði og segði, Ein maður, sum er kallaður Jesus, gjørdi leir, og salvaði eygu míni,

og segði við meg, Far til hylin Sí-lŏ-ăm, og tváa *tær:* og eg fór og tvó *mær,* og eg fekk sjón.

12 Tá søgdu teir við hann, Hvar er hann? Hann segði, Eg veit ikki.

13 ¶ Teir førdu til Pharisēarar-nar hann sum áður var blindur.

14 Og tað var sabbatsdagurin, tá ið Jesus gjørdi leirið og opnaði eygu hansara.

15 Tá spurdu eisini Pharisēarar-nir hann aftur, hvussu hann hevði fingið sjón sína. Hann segði við teir, Hann koyrdi leir uppá eygu míni, og eg tváaði *mær,* og síggi.

16 Tí søgdu summir av Pharisēarunum, Hesin maðurin er ikki av Guði, av tí at hann heldur ikki sabbatsdagin. Aðrir søgdu, Hvussu kann ein maður, sum er ein syndari, gera slík kraftarverk? Og har varð ein sundurdeiling teirra millum.

17 Teir siga við hin blinda mannin aftur, Hvat sigurt tú um hann, at hann hevur opnað eygu tíni? Hann segði, Hann er ein prophetur.

18 Men Jødarnir trúðu ikki við-víkjandi honum, at hann hevði verið blindur, og móttók sjón sína, fyrrenn teir kallaðu foreld-ur hansara sum hevði fingið sjón sína.

19 Og teir spurdu tey, sigandi, Er hetta sonur tykkara, sum tit siga varð føddur blindur? hvussu sær hann tá nú?

20 Foreldur hansara svaraðu teimum og søgdu, Vit vita at hetta er sonur okkara, og at hann varð føddur blindur:

21 Men við hvørjum háttarlagi hann nú sær, vita vit ikki; ella hvør hevur opnað eygu hansara, vita vit ikki: hann hevur aldur*in;* spyrjið hann: hann skal tala fyri sær sjálvum.

22 Hesi *orðini* talaðu foreldur hansara, av tí at tey óttaðust Jødar-nar: tí at Jødarnir høvdu samtykt longu, at um nakar maður játtaði at hann var Christus, skuldi hann verða koyrdur út úr sýnagoguni.

23 Tí søgdu foreldur hansara, Hann hevur aldur*in;* spyrjið hann.

24 Tá kallaðu teir aftur mann-in sum var blindur, og søgdu við hann, Gev Guði pris*an*ina: vit vita at hesin maðurin er ein syndari.

25 Hann svaraði og segði, Hvørt hann veri ein syndari, *ella ei,* veit eg ikki: eitt veit eg, at hvar ið eg var blindur, nú síggi eg.

26 Tá søgdu teir til hansara aftur, Hvat gjørdi hann við teg? hvussu opnaði hann eygu tíni?

27 Hann svaraði teimum, Eg havi sagt tykkum longu, og tit hoyrdu ikki: hvørsvegna vildu tit hoyrt *tað* aftur? vilja tit eisini verða lærusveinar hansara?

28 Tá spiltu teir hann út, og søg-du, Tú ert lærusveinur hansara; men vit eru lærusveinar Mósesar.

29 Vit vita at Guð talaði við Móses: *hvat* hesum *manni viðvík-ur,* vit vita ikki hvaðani hann er.

30 Maðurin svaraði og segði við teir, Altso, herí er eitt undrunar-vert ting, at tit vita ikki hvaðani hann er, og *tó* hevur hann opnað eygu míni.

31 Nú, vit vita at Guð hoyrir ikki syndarar: men um nakar maður veri ein tilbiðjari av Guði, og ger vilja hansara, hann hoyrir hann.

32 Síðan verøldin byrjaði, varð tað ikki hoyrt, at nakar maður opnaði eyguni á ēinum sum varð føddur blindur.

33 Um hesin maðurin var ikki av Guði, kundi hann einkið gjørt.

34 Teir svaraðu og søgdu við hann, Tú varðst aldeilis føddur í syndum, og lærirt tú okkum? Og teir kastaðu hann út.

35 Jesus hoyrdi at teir høvdu kastað hann út; og tá ið hann hevði funnið hann, segði hann við hann, Trýrt tú á Son Guðs?

36 Hann svaraði og segði, Hvør er hann, Harri, at eg kann trúgva á hann?
37 Og Jesus segði við hann, Tú hevurt bæði sæð hann, og tað er hann sum talar við teg.
38 Og hann segði, Harri, eg trúgvi. Og hann tilbað hann.
39 ¶ Og Jesus segði, Til dóms eri eg komin inn í henda heim, at teir sum síggja ikki, máttu síggja; og at teir sum síggja, máttu verða gjørdir blindir.
40 Og *summir* av Pharisēarunum, sum vóru hjá honum, hoyrdu hesi orð, og søgdu við hann, Eru vit blindir eisini?
41 Jesus segði við teir, Um tit vóru blindir, høvdu tit onga synd havt: men nú siga tit, Vit síggja; synd tykkara tí verður verandi.

KAPITUL 10

SANNILIGA, sanniliga, sigi eg tykkum, Hann ið gongur ikki inn um dyrnar inn í seyðabyrgið, men klývur upp onkran annan veg, hin sami er ein tjóvur og ein ránsmaður.
2 Men hann ið gongur inn um dyrnar, er hirðin hjá seyðunum.
3 Fyri honum duravørðurin letur upp; og seyðirnir hoyra rødd hansara: og hann kallar sínar egnu seyðir við navni, og leiðir teir út.
4 Og tá ið hann setur út sínar egnu seyðir, gongur hann undan teimum, og seyðirnir fylgja honum: tí at teir kenna reyst hansara.
5 Og einum fremmandum vilja teir ikki fylgja, men vilja flýggja frá honum: tí at teir kenna ikki røddina hjá fremmandum.
6 Hesa dømisøgu talaði Jesus við teir: men teir skiltu ikki hvørji ting tey vóru sum hann talaði við teir.
7 Tá segði Jesus við teir aftur, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Eg eri dyrnar hjá seyðunum.
8 Allir, sum nakrantíð komu áðrenn eg, eru tjóvar og ránsmenn: men seyðirnir hoyrdu teir ikki.
9 Eg eri dyrnar: um meg, um nakar maður gangi inn, hann skal verða frelstur, og skal ganga inn og út, og finna beiti.
10 Tjóvurin kemur ikki, uttan fyri at stjala, og at drepa, og at oyða: eg eri komin, at teir máttu hava lív, og at teir máttu hava *tað* meiri ríkiligani.
11 Eg eri hin góði hirðin: hin góði hirðin gevur sítt lív fyri seyðirnar.
12 Men hann sum er ein leigusveinur, og ikki hirðin, hvørs egnu seyðirnir eru ikki, sær úlvin koma, og fer frá seyðunum, og flýggjar: og úlvurin fangar teir, og spjaðir seyðirnar.
13 Leigusveinurin flýggjar, av tí at hann er ein leigusveinur, og hevur ikki umsorgan fyri seyðunum.
14 Eg eri hin góði hirðin, og kenni mínar *seyðir,* og eri kendur av mínum.
15 Eins og Faðirin kennir meg, enntá soleiðis kenni eg Faðirin: og eg leggi niður mítt lív fyri seyðirnar.
16 Og aðrar seyðir havi eg, sum eru ikki av hesum byrgi: teimum eisini má eg koma við, og teir skulu hoyra reyst mína; og tað skal vera ēitt byrgi, *og* ēin hirði.
17 Tí elskar Faðir mín meg, av tí at eg leggi niður mítt lív, at eg mátti taka tað aftur.
18 Eingin maður tekur tað frá mær, men eg leggi tað niður av mær sjálvum. Eg havi mátt til at leggja tað niður, og eg havi mátt til at taka tað aftur. Hetta boðið havi eg fingið av Faðir mínum.
19 ¶ Tað varð ein sundurdeiling tessvegna aftur millum Jødanna, vegna hesar framsagnir.
20 Og mangir av teimum søgdu, Hann hevur ein djevul, og er óður; hví hoyra tit hann?

21 Aðrir søgdu, Hetta eru ikki orðini hjá honum sum hevur ein djevul. Kann ein djevul opna eyguni á blindum?

22 ¶ Og tað var í Jerusalem vígslu-hátíðin, og tað var vetur.

23 Og Jesus gekk í templinum, í súlnagangi Sálomons.

24 Tá komu Jødarnir runt um hann, og søgdu við hann, Hvussu leingi veldurt tú okkum at ivast? Um tú veri Christus˜, sig okkum greidliga.

25 Jesus svaraði teimum, Eg segði tykkum, og tit trúðu ikki: verkini sum eg geri í navni Faðirs míns, tey bera vitnisburð um meg.

26 Men tit trúgva ikki, av tí at tit eru ikki av seyðum mínum, eins og eg segði við tykkum.

27 Mínir seyðir hoyra reyst mína, og eg kenni teir, og teir fylgja mær:

28 Og eg gevi teimum ævigt lív; og teir skulu aldri glatast, eiheldur skal nakar *maður* slíta teir út úr hond míni.

29 Faðir mín, sum gav mær *teir,* er størri enn allir; og eingin *maður* er førur fyri at slíta *teir* út úr hond Faðirs míns.

30 Eg og Faðir *mín* eru ēitt.

31 Tá tóku Jødarnir upp steinar aftur at steina hann.

32 Jesus svaraði teimum, Mong góð verk havi eg sýnt tykkum frá Faðir mínum; fyri hvørt av teim verkunum steina tit meg?

33 Jødarnir svaraðu honum, sigandi, Fyri eitt gott verk steina vit teg ikki; men fyri Guðsspottan; og av tí at tú, verandi maður, gert teg sjálvan *til* Guð.

34 Jesus svaraði teimum, Er tað ikki skrivað í lóg tykkara, Eg segði, Tit eru gudar?

35 Og um hann kallaði teir gudar, til hvørja Guðs orð kom, og skriftin kann ei verða brotin;

36 Siga tit um hann, hvønn Faðirin hevur halgað, og sent inn í heimin, Tú Guðsspottart; av tí at eg segði, Eg eri Sonur Guðs?

37 Um eg geri ikki verkini hjá Faðir mínum, trúgvið mær ikki.

38 Men um eg geri, tó *at* tit trúgvi ikki mær, trúgvið verkunum: at tit mega vita, og trúgva, at Faðirin *er* í mær, og eg í honum.

39 Tí royndu teir aftur at taka hann: men hann komst undan úr hond teirra,

40 Og fór avstað aftur handan Jordan, inn á staðið har Jóhannes av fyrstan *tíð* doypti; og hann varð har.

41 Og mangir leitaðu til hansara, og søgdu, Jóhannes gjørdi einkið kraftarverk: men øll ting, sum Jóhannes talaði um henda mann, vóru sonn.

42 Og mangir trúðu á hann har.

KAPITUL 11

NÚ, ein ávísur *maður* var sjúkur, *nevndur* Lāz´-ă-rŭs, úr Bethaniu, býi *teirra* Mariu og systur hennara Marthu.

2 (Tað var *tann* Maria sum salvaði Harran við salvu, og turkaði føtur hansara við hári sínum, hvørs bróðir Lāz´-ă-rŭs var sjúkur.)

3 Tí sendu systrar hansara til hansara, sigandi, Harri, sí, hann, hvønn tú elskart, er sjúkur.

4 Tá ið Jesus hoyrdi *tað,* segði hann, Hesin sjúkdómur er ikki til deyða, men fyri dýrd Guðs, at Sonur Guðs mátti verða dýrðmettur harvið^.

5 Nú, Jesus elskaði Marthu, og systur hennara, og Lāz´-ă-rŭs.

6 Tá ið hann hevði hoyrt tessvegna, at hann var sjúkur, varð hann tveir dagar enn á tí sama staðnum har hann var.

7 Síðan, eftir tað, sigur hann við lærusveinar *sínar,* Latum okkum fara inn í Judæu aftur.

8 *Hansara* lærusveinar siga við hann, Meistari, Jødarnir fyri

stuttum søktu at steina teg; og fert tú hagar aftur?

9 Jesus svaraði, Eru ikki tólv tímar í deginum? Um nakar maður gangi um dagin, hann snávar ikki, av tí at hann sær ljósið av hesum heimi.

10 Men um ein maður gangi um náttina, hann snávar, av tí at tað er einkið ljós í honum.

11 Hesi ting segði hann: og eftir tað sigur hann við teir, Vinur okkara Lāz´-ă-rŭs svevur; men eg fari, at eg má vekja hann úr svøvni.

12 Tá søgdu lærusveinar hansara, Harri, um hann sovi, skal honum vera væl *statt*.

13 Hvussu enn er, Jesus talaði um deyða hansara: men teir hildu at hann hevði talað um *tað* at taka *sær* hvíld í svøvni.

14 Tá segði Jesus við teir greiniliga, Lāz´-ă-rŭs er deyður.

15 Og eg eri glaður fyri tykkara sakir, at eg var ikki har, til tess endamáls *at* tit mega trúgva; hóast hetta, latum okkum fara til hansara.

16 Tá segði Tummas, sum verður kallaður Dĭ´-dȳ-mŏs, við sínar samlærusveinar, Latum okkum eisini fara, at vit mega doyggja við honum.

17 Síðan, tá ið Jesus kom, fann hann at hann hevði *ligið* í grøvini *í* fýra dagar longu.

18 Nú, Bethania var nær Jerusalem, um fimtan stádiur frá:

19 Og mangir av Jødunum komu til Marthu og Mariu, at troysta tær viðvíkjandi bróður teirra.

20 Martha, so skjótt sum hon hoyrdi at Jesus kom, tá fór og møtti honum: men Maria sat *enn* í húsinum.

21 Tá segði Martha við Jesus, Harri, um tú hevðirt verið her, hevði bróðir mín ikki doyð.

22 Men eg veit, at sjálvt nú, hvatsumhelst tú vilt umbiðja av Guði, Guð vil geva *tað* tær.

23 Jesus sigur við hana, Bróðir tín skal rísa aftur.

24 Martha sigur við hann, Eg veit at hann skal rísa aftur í uppreisnini á evsta degi.

25 Jesus segði við hana, Eg eri uppreisnin, og lívið: hann ið trýr á meg, hóast hann var deyður, tó skal hann liva:

26 Og hvørsumhelst *ið* livir og trýr á meg, skal aldri doyggja. Trýrt tú hesum?

27 Hon sigur við hann, Ja, Harri: eg trúgvi at tú ert Christus˘, Sonur Guðs, sum skuldi koma inn í heimin.

28 Og tá ið hon so hevði sagt, fór hon sín veg, og kallaði Mariu, systur sína, loyniligani, sigandi, Meistarin er komin, og kallar á teg.

29 So skjótt sum hon hoyrdi *tað,* reistist hon skundisligani, og kom til hansara.

30 Nú, Jesus var ikki enn komin inn í býin, men var á tí staðnum har Martha møtti honum.

31 Jødarnir tá, sum vóru hjá henni í húsinum, og troystaðu hana, tá ið teir sóu Mariu, at hon reis upp skundisligani og fór út, fylgdu henni, sigandi, Hon fer á grøvina at gráta har.

32 Síðan, tá ið Maria var komin har Jesus var, og sá hann, fell hon niður við føtur hansara, sigandi við hann, Harri, um tú hevðirt verið her, hevði bróðir mín ikki doyð.

33 Tá ið Jesus tí sá hana grátandi, og Jødarnar eisini grátandi, sum komu við henni, venaðist hann í andanum, og varð rørdur,

34 Og segði, Hvar hava tit lagt hann? Teir søgdu við hann, Harri, kom og síggj.

35 Jesus græt.

36 Tá søgdu Jødarnir, Sí, hvussu hann elskaði hann!

37 Og summir av teimum søgdu, Kundi ikki hesin maðurin, sum opnaði eyguni á tí blinda, havt volt, at sjálvt hesin maðurin skuldi ikki havt doyð?

38 Jesus tí aftur venandi í sær sjálvum kemur til grøvina. Hon var eitt helli, og ein steinur lá uppiá tí.

39 Jesus segði, Takið tit burtur steinin. Martha, systir hansara sum var deyður, sigur við hann, Harri, eftir hesa tíð stinkar hann: tí hann hevur verið *deyður í* fýra dagar.

40 Jesus sigur við hana, Segði eg tær ikki, at um tú vildirt trúgva, skuldirt tú síggja Guðs dýrd?

41 Tá tóku teir burtur steinin *frá staðnum* har hin deyði var lagdur. Og Jesus lyfti upp eygum *sínum,* og segði, Faðir, eg takki tær at tú hevurt hoyrt meg.

42 Og eg vitsti at tú hoyrirt meg altíð: men vegna fólkið, sum stendur hjá, segði eg *tað,* at tey mega trúgva at tú hevurt sent meg.

43 Og tá ið hann svá hevði talað, rópti hann við harðari rødd, Lāz´-ă-rŭs, kom fram.

44 Og hann, sum var deyður, kom fram, bundin hond og fót við gravklæðum: og hans andlit var bundið um við einum sveittadúki. Jesus sigur við teir, Loysið hann, og latið hann fara.

45 Mangir av Jødunum sum komu til Mariu, og høvdu sæð tingini sum Jesus gjørdi, tá trúðu á hann.

46 Men summir av teimum fóru sínar vegir til Pharisēararnar, og søgdu teimum hvørji ting Jesus hevði gjørt.

47 ¶ Tá savnaðu teir fremstu prestarnir og Pharisēararnir eitt ráð, og søgdu, Hvat gera vit? tí at hesin maðurin ger mong kraftarverk.

48 Um vit lata hann soleiðis vera, vilja allir *menn* trúgva á hann: og Rómverjarnir skulu koma og taka burtur bæði plass várt og tjóð.

49 Og ēin av teimum, *nevndur* Cāĭ´-â-phās, verandi høvuðsprestur tað sama árið, segði við teir, Tit vita als einkið,

50 Eiheldur umhugsa, at tað er gagnligt hjá okkum at ēin maður skuldi doyð fyri fólkið, og at øll tjóðin glatist ikki.

51 Og hetta talaði hann ikki av sær sjálvum: men verandi høvuðsprestur tað árið, prophēteraði hann at Jesus skuldi doyggja fyri ta tjóðina;

52 Og ikki fyri ta tjóðina einans, men eisini at hann skuldi savna saman í ēitt Guðs børn sum vóru spjødd útumkring.

53 Síðan, frá tí degi fram, ráðførdust teir saman fyri at taka hann av lívi.

54 Jesus tí gekk ei meira opinlýsliga millum Jødanna; men fór haðani at einum landi, nær við oyðuna, inn í ein stað, kallaðan Ē´-phră-ĭm, og har helt áfram við sínum lærusveinum.

55 ¶ Og umleypið hjá Jødunum var nær fyri hond: og mangir fóru uttan av landinum niðan til Jerusalem áðrenn umleypið, at skírga seg.

56 Tá leitaðu teir eftir Jesusi, og talaðu sín ámillum, sum teir stóðu í templinum, Hvat halda tit, at hann vil ikki koma til hátíðina?

57 Nú, bæði teir fremstu prestarnir og Pharisēararnir høvdu givið eini boð, at um nakar maður vitsti hvar hann var, skuldi hann sýna *tað,* at teir máttu taka hann.

KAPITUL 12

SÍÐAN, seks dagar áðrenn umleypið, kom Jesus til Bethaniu, har Lāz´-ă-rŭs var, sum hevði verið deyður, hvønn hann reisti frá teimum deyðu.

2 Har gjørdu tey honum eina kvøldmáltíð; og Martha tænti: men Lāz´-ă-rŭs var ēin teirra sum sótu at borðinum við honum.
3 Tá tók Maria eitt pund av nardus-salvu, sera kostnaðarsamari, og salvaði føturnar hjá Jesusi, og turkaði hansara føtur við hári sínum: og húsið varð fylt við anganum av salvuni.
4 Tá sigur ēin av hansara lærusveinum, Judas Iscariot, *sonur* Símunar, sum skuldi svíkja hann,
5 Hví varð ikki henda salva seld fyri trý hundrað denarar, og givið til hini fátæku?
6 Hetta segði hann, ikki at hann hevði umsorgan fyri hinum fátæku; men av tí at hann var ein tjóvur, og hevði taskuna, og bar tað *ið* varð latið harí.
7 Tá segði Jesus, Lat hana vera: ímóti deginum av míni gravlegging hevur hon goymt hetta.
8 Tí hini fátæku altíð hava tit hjá tykkum; men meg hava tit ikki altíð.
9 Mikið fólk av Jødunum tessvegna vitsti at hann var har: og tey komu ikki fyri Jesu skyld einans, men at tey máttu síggja Lāz´-ă-rŭs eisini, hvønn hann hevði reist frá hinum deyðu.
10 ¶ Men teir fremstu prestarnir ráðførdust, at teir máttu taka Lāz´-ă-rŭs av lívi eisini;
11 Av tí at av hansara ávum mangir av Jødunum fóru burtur, og trúðu á Jesus.
12 ¶ Á næsta deginum, mikið fólk sum vóru komin til hátíðina, tá ið tey hoyrdu at Jesus kom til Jerusalem,
13 Tóku greinar av pálmatrøum, og fóru fram at møta honum, og rópaðu, Hō-săn´-nă: Vælsignaður *er* Kongur Ísraels, sum kemur í navni Harrans.
14 Og Jesus, tá ið hann hevði funnið ein ungan asna, settist hará; sum skrivað stendur,
15 Óttast ikki, Sĭ´-ŏns dóttir: sí, Kongur tín kemur, sitandi á einum asnarfyli.
16 Hesi ting skiltu ikki hansara lærusveinar í fyrstani: men tá ið Jesus var dýrðmettur, tá mintust teir at hesi tingini stóðu skrivað um hann, og *at* teir høvdu gjørt honum hesi tingini.
17 Fólkið tessvegna, sum var við honum tá ið hann kallaði Lāz´-ă-rŭs út úr grøv hansara, og reisti hann frá teimum deyðu, gav frágreiðing.
18 Fyri hesa grund møtti fólkið eisini honum, tí at tey hoyrdu at hann hevði gjørt hetta kraftarverkið.
19 Pharisēararnir tí søgdu sín ámillum, Varnast tit, hvussu tit vinna einkið? sí, heimurin er farin aftaná honum.
20 ¶ Og har vóru ávísir Grikkar millum teirra sum komu niðan at tilbiðja á hátíðini:
21 Hinir somu komu tessvegna til Philippusar, sum var úr Bĕth-să´-ĭ-dŭ av Galilēu, og tráaðu hann, sigandi, Tygum, vit vildu sæð Jesus.
22 Philippus kemur og sigur Andreasi: og aftur Andreas og Philippus siga Jesusi.
23 ¶ Og Jesus svaraði teimum, sigandi, Tímin er komin, at Menniskjusonurin skuldi verða dýrðmettur.
24 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Uttan eitt hveitikorn falli inn í jørðina og doyggi, verður tað einsamalt: men um tað doyggi, ber tað fram miklan ávøkst.
25 Hann ið elskar sítt lív, skal missa tað; og hann ið hatar sítt lív í hesum heimi, skal varðveita tað *fram*at ævigum lívi.
26 Um nakar maður tæni mær, lat hann fylgja mær; og har *sum* eg eri, har skal eisini tænari mín vera: um nakar maður tæni mær, hann vil Faðir *mín* æra.

27 Nú er mín sál órógvað; og hvat skal eg siga? Faðir, bjarga mær frá hesum tíma: men fyri hesa grund kom eg at hesum tíma.

28 Faðir, dýrðmet títt navn. Tá kom tað ein rødd frá himni, *sigandi,* Eg havi bæði dýrðmett *tað,* og vil dýrðmeta *tað* aftur.

29 Fólkið tessvegna, sum stóð hjá, og hoyrdi *tað,* segði, at toran gekk: onnur søgdu, Ein eingil talaði til hansara.

30 Jesus svaraði og segði, Henda rødd kom ikki mína vegna, men fyri tykkara sakir.

31 Nú er dómurin av hesum heimi: nú skal prinsurin av hesum heimi verða kastaður út.

32 Og eg, um eg verði lyftur upp frá jørðini, vil draga allar *menn* til mín.

33 Hetta segði hann, uppmálandi hvønn deyða hann skuldi doyggja.

34 Fólkið svaraði honum, Vit hava hoyrt úr lógini, at Christus verður um ævir: og hvussu sigurt tú, Menniskjusonurin má verða hevjaður upp? hvør er hesin Menniskjusonurin?

35 Jesus tá segði við tey, Enn eina lítla stund er ljósið hjá tykkum. Gangið, meðan tit hava ljósið, at ikki myrkur komi uppá tykkum: tí at hann sum gongur í myrkri, veit ikki hvagar hann fer.

36 Meðan tit hava ljós, trúgvið á ljósið, at tit mega vera børnini hjá ljósi. Hesi ting talaði Jesus, og fór avstað, og fjaldi seg frá teimum.

37 ¶ Men hóast hann hevði gjørt so mong kraftarverk frammi fyri teimum, tó trúðu tey ikki á hann:

38 At framsøgn Ê-saî´-ás-ar prophets mátti verða uppfylt, sum hann talaði, Harri, hvør hevur trúð vári frásøgn? og fyri hvørjum hevur armur Harrans verðið opinberaður?

39 Tí kundu tey ikki trúgva, av tí at Ê-saî´-ás segði aftur,

40 Hann hevur blindað eygu teirra, og herdað hjørtu teirra; at tey skuldu ikki síggja við eygum *sínum,* ella skilja við hjarta *sínum,* og verða umvend, og eg skuldi grøða tey.

41 Hesi ting segði Ê-saî´-ás, tá ið hann sá dýrd hansara, og talaði um hann.

42 ¶ Hóast hetta, millum hinna fremstu av stjórnarunum trúðu eisini mangir á hann; men uppá grund av Pharisēarunum játtaðu teir *hann* ikki, at ikki teir skuldu verðið stoyttir út úr sýnagoguni:

43 Tí at teir elskaðu prís*an* manna meiri enn prís*an* Guðs.

44 ¶ Jesus rópaði og segði, Hann ið trýr á meg, trýr ikki á meg, men á hann sum sendi meg.

45 Og hann sum sær meg, sær hann sum sendi meg.

46 Eg eri komin — eitt ljós inn í heimin, at hvørsumhelst *ið* trýr á meg, skuldi ei verða *verandi* í myrkri.

47 Og um nakar maður hoyri orð míni, og trúgvi ikki, eg dømi hann ikki: tí at eg kom ikki at døma heimin, men at frelsa heimin.

48 Hann ið vrakar meg, og tekur ikki ímóti orðum mínum, hevur ēin sum dømir hann: orðið sum eg havi talað, tað sama skal døma hann á evsta degi.

49 Tí at eg havi ikki talað av mær sjálvum; men Faðirin, sum sendi meg, hann gav mær eitt boð, hvat eg skuldi siga, og hvat eg skuldi tala.

50 Og eg veit at hansara boð er lív ævigtvarandi: hvatsumhelst eg tali, tessvegna, enntá *so* sum Faðirin segði við meg, soleiðis tali eg.

KAPITUL 13

NÚ, áðrenn umleyps-hátíðina, tá ið Jesus vitsti, at hansara tími var komin til at hann skuldi fara avstað út úr hesum heimi at Faðirinum, havandi elskað sínar egnu sum vóru í heiminum, elskaði hann teir *fram*at endanum.

2 Og kvøldmáltíð*in* verandi endað, djevulin havandi nú lagt inn í hjartað á Judasi Iscariot, Símunar *syni,* at svíkja hann;

3 Jesus, vitandi at Faðirin hevði givið øll ting inn í hendur hansara, og at hann var komin frá Guði, og fór til Guðs;

4 Rísur hann frá kvøldmáltíð*ini,* og legði til síðis klæðir síni; og tók eitt línklæði, og gyrdi seg.

5 Eftir tað hellir hann vatn í eitt ílat, og fór undir at tváa føturnar hjá lærusveinunum, og at turka *teir* við línklæðinum, við hvørjum hann var gyrdur.

6 Tá kemur hann til Símun Pæturs: og Pætur sigur við hann, Harri, tváart tú føtur mínar?

7 Jesus svaraði og segði við hann, Hvat eg geri, skynart tú ikki nú; men tú skalt skyna hereftir.

8 Pætur sigur við hann, Tú skalt aldri tváa føtur mínar. Jesus svaraði honum, Um eg tvái tær ikki, hevurt tú ongan lut við mær.

9 Símun Pætur sigur við hann, Harri, ikki føtur mínar einans, men eisini hendur *mínar* og høvur *mítt*.

10 Jesus sigur við hann, Hann, sum er tváaður, tarvast ikki, uttan at tváa føtur *sínar,* men er reinur hvørt vet: og tit eru reinir, men ikki allir.

11 Tí at hann vitsti, hvør skuldi svíkja hann; tí segði hann, Tit eru ikki allir reinir.

12 So eftir *at* hann hevði tvigið føtur teirra, og hevði tikið klæðir síni, og var setstur niður aftur, segði hann við teir, Skyna tit, hvat eg havi gjørt við tykkum?

13 Tit kalla meg Meistara og Harra: og tit siga væl; tí *tað* eg eri.

14 Um tá eg, *tykkara* Harri og Meistari, havi tvigið føtur tykkara; tit eisini áttu at tváa føturnar hjá hvørjum øðrum.

15 Tí at eg havi givið tykkum eitt fyridømi, at tit skuldu gera eins og eg havi gjørt móti tykkum.

16 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Tænarin er ikki størri enn harri hansara; eiheldur hann, sum er sendur, størri enn hann sum sendi hann.

17 Um tit skyni hesi ting, glaðir eru tit, um tit geri tey.

18 ¶ Eg tali ikki um tykkum allar: eg veit, hvørjar eg havi *út*valt: men at skriftin má verða uppfylt, Hann, sum etur breyð við mær, hevur lyft upp hæli sínum ímóti mær.

19 Nú sigi eg tykkum, áðrenn tað komi, at, tá ið tað er borið á, tit mega trúgva at eg eri *hann*.

20 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Hann, sum tekur ímóti hvørjumsumhelst *ið* eg sendi, tekur ímóti mær; og hann sum tekur ímóti mær, tekur ímóti honum sum sendi meg.

21 Tá ið Jesus so hevði sagt, varð hann rørdur í anda, og vitnaði, og segði, Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, at ēin av tykkum skal svíkja meg.

22 Tá hugdu lærusveinarnir hvør á annan, ivandi um hvønn hann talaði.

23 Nú, har var, lenandi á Jesu barm, ēin av hansara lærusveinum, hvønn Jesus elskaði.

24 Símun Pætur tí gjørdi tekin til hansara, at hann skuldi spyrja hvør tað skuldi verið, um hvønn hann talaði.

25 Liggjandi á Jesu bróst, sigur hann tá við hann, Harri, hvør er tað?

26 Jesus svaraði, Hann tað er, til hvørs eg skal geva ein bita, tá ið eg havi dyppað *hann*. Og tá ið hann hevði dyppað bitan, gav hann *hann* til Judasar Iscariots, *sonar* Símunar.

27 Og eftir bitan fór Satan inn í hann. Tá segði Jesus við hann, Tað tú gert, ger snarliga.

28 Nú, eingin maður við borðið vitsti, fyri hvat endamál hann talaði hetta við hann.

29 Tí at summir *teirra* hugsaðu, av tí at Judas hevði taskuna, at Jesus hevði sagt við hann, Keyp *tey tingini* sum vit hava tørv á ímóti hátíðini; ella, at hann skuldi geva okkurt til hini fátæku.

30 Hann tá, havandi fingið bitan, fór í stundini út: og tað var nátt.

31 ¶ Tessvegna, tá ið hann var farin út, segði Jesus, Nú er Menniskjusonurin dýrðmettur, og Guð er dýrðmettur í honum.

32 Um Guð veri dýrðmettur í honum, skal Guð eisini dýrðmeta hann í sær sjálvum, og skal beinanvegin dýrðmeta hann.

33 Lítlu børn, enn eina lítla stund eri eg hjá tykkum. Tit skulu søkja meg: og eins og eg segði við Jødarnar, Hvagar eg fari, kunnu tit ikki koma; soleiðis nú sigi eg við tykkum.

34 Eitt nýtt boð gevi eg tykkum, At tit elskið hvør annan; eins og eg havi elskað tykkum, at tit eisini elskið hvør annan.

35 Av hesum skulu allir *menn* vita, at tit eru lærusveinar mínir, um tit havi kærleika hvør til annan.

36 ¶ Símun Pætur segði við hann, Harri, hvagar fert tú? Jesus svaraði honum, Hvagar eg fari, kanst tú ikki fylgja mær nú; men tú skalt fylgja mær síðani.

37 Pætur segði við hann, Harri, hví kann ikki eg fylgja tær nú? Eg vil leggja niður mítt lív fyri tína skyld.

38 Jesus svaraði honum, Vilt tú leggja niður títt lív fyri mína skyld? Sanniliga, sanniliga, sigi eg tær, Hanin skal ikki gala, fyrrenn tú hevurt avnoktað meg trærreisur.

KAPITUL 14

LATIÐ ikki tykkara hjarta vera órógvað: tit trúgva á Guð, trúgvið eisini á meg.

2 Í Faðirs míns húsi eru mong ríkmanshús: um *tað var* ikki *so*, vildi eg havt sagt tykkum. Eg fari at fyribúgva eitt stað til tykkara.

3 Og um eg fari og fyribúgvi eitt stað til tykkara, vil eg koma aftur, og móttaka tykkum til mín sjálvs; at har eg eri, *har* mega tit vera eisini.

4 Og hvagar eg fari vita tit, og vegin vita tit.

5 Tummas sigur við hann, Harri, vit vita ikki hvagar tú fert; og hvussu kunnu vit vita vegin?

6 Jesus sigur við hann, Eg eri vegurin, sannleikin, og lívið: eingin maður kemur at Faðirinum, uttan við mær.

7 Um tit høvdu kent meg, *tá* høvdu tit havt kent Faðir mín við: og hiðanífrá kenna tit hann, og hava sæð hann.

8 Philippus sigur við hann, Harri, sýn okkum Faðirin, og tað *er* okkum nóg mikið.

9 Jesus sigur við hann, Havi eg verið so langa tíð hjá tykkum, og tó hevurt tú ikki kent meg, Philippus? hann, ið hevur sæð meg, hevur sæð Faðirin; og hvussu sigurt tú *tá*, Sýn okkum Faðirin?

10 Trýrt tú ikki, at eg eri í Faðirinum, og Faðirin í mær? orðini, sum eg tali tykkum, tali eg ikki av mær sjálvum: men Faðirin, sum býr í mær, hann ger verkini.

11 Trúgvið mær, at eg *eri* í Faðirinum, og Faðirin í mær: ella annars, trúgvið mær fyri sjálva verkanna skuld.

12 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Hann ið trýr á meg, verkini sum eg geri, skal hann gera eisini; og størri *verk* enn hesi skal hann gera; av tí at eg fari til Faðirs míns.

13 Og hvatsumhelst *ið* tit skulu umbiðja í navni mínum, tað vil eg gera, at Faðirin má verða dýrðmettur í Syninum.

14 Um tit skulu umbiðja nakað ting í navni mínum, eg vil gera *tað*.

15 ¶ Um tit elski meg, haldið boð míni.

16 Og eg vil biðja Faðirin, og hann skal geva tykkum ein annan Uggara, at hann má verða hjá tykkum um ævir;

17 *Enntá* sannleikans Anda; hvørjum heimurin kann ikki taka ímóti, av tí at hann sær hann ikki, eiheldur kennir hann: men tit kenna hann; tí at hann býr hjá tykkum, og skal verða í tykkum.

18 Eg vil ikki eftirlata tykkum ugganarleysar: eg vil koma til tykkara.

19 Enn eina lítla stund, og heimurin sær meg ikki meira; men tit síggja meg: av tí at eg livi, skulu tit liva eisini.

20 Á tí degi skulu tit vita, at eg *eri* í Faðir mínum, og tit í mær, og eg í tykkum.

21 Hann ið hevur boð míni, og heldur tey, hann tað er sum elskar meg: og hann ið elskar meg, skal vera elskaður av Faðir mínum, og eg vil elska hann, og vil geva meg sjálvan til kennar fyri honum.

22 Judas sigur við hann, ikki Iscariot, Harri, hvussu er tað at tú vilt geva teg sjálvan til kennar at okkum, og ikki at heiminum?

23 Jesus svaraði og segði við hann, Um ein maður elski meg, hann vil varðveita orð míni: og Faðir mín vil elska hann, og vit vilja koma til hansara, og gera okkara bústað hjá honum.

24 Hann, ið elskar meg ikki, varðveitir ikki mínar framsagnir: og orðið, sum tit hoyra, er ikki mítt, men Faðirsins sum sendi meg.

25 Hesi ting havi eg talað tykkum, verandi *enn* hjástaddur hjá tykkum.

26 Men Uggarin, *sum er* Halgi Andin, hvønn Faðirin vil senda í navni mínum, hann skal læra tykkum øll ting, og føra øll ting til minnis tykkara, hvatsumhelst *ið* eg havi sagt tykkum.

27 Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum: ikki eins og heimurin gevur, gevi eg tykkum. Latið ikki tykkara hjarta vera órógvað, eiheldur latið tað vera bangið.

28 Tit hava hoyrt hvussu eg segði við tykkum, Eg fari avstað, og komi *aftur* til tykkara. Um tit elskaðu meg, vildu tit fegnast, av tí at eg segði, Eg fari til Faðirin: tí at Faðir mín er størri enn eg.

29 Og nú havi eg sagt tykkum, áður enn tað beri á, at, tá ið tað er borið á, tit mega trúgva.

30 Hereftir vil eg ikki tosa nógv við tykkum: tí at prinsurin av hesum heimi kemur, og eigur einkið í mær.

31 Men *fyri* at heimurin má vita, at eg elski Faðirin; og eins og Faðirin gav mær boð, enntá soleiðis geri eg. Reisist, latum okkum fara hiðani.

KAPITUL 15

EG eri tað sanna víntræið, og Faðir mín er víngarðsmaðurin.

2 Hvørja grein í mær sum ber ikki ávøkst, tekur hann burtur: og hvørja *grein* sum ber ávøkst, hana reinskar hann, at hon má bera fram meiri ávøkst.

3 Nú eru tit reinir gjøgnum orðið sum eg havi talað innat tykkum.

4 Verðið í mær, og eg í tykkum. Eins og greinin kann ikki bera ávøkst av sær sjálvari, uttan hon verði *verandi* í víntræinum; ei meira kunnu tit, uttan tit verði *verandi* í mær.

5 Eg eri víntræið, tit *eru* greinarnar: Hann ið verður í mær, og eg í honum, hin sami ber fram miklan ávøkst: tí at uttan meg kunnu tit einkið gera.

6 Um ein maður verði ikki *verandi* í mær, verður hann kastaður fram sum ein grein, og verður følnaður; og menn savna tær, og kasta *tær* inn í eldin, og tær verða brendar.

7 Um tit verði *verandi* í mær, og orð míni verði *verandi* í tykkum, skulu tit umbiðja hvat tit vilja, og tað skal verða gjørt tykkum.

8 Í hesum verður Faðir mín dýrðmettur, at tit beri miklan ávøkst; so skulu tit vera mínir lærusveinar.

9 Eins og Faðirin hevur elskað meg, soleiðis havi eg elskað tykkum: verðið tit áfram í kærleika mínum.

10 Um tit haldi boð míni, skulu tit verða *verandi* í kærleika mínum; enntá sum eg havi hildið boðˇ Faðirs míns, og eri *verandi* í kærleika hansara.

11 Hesi ting havi eg talað til tykkara, at mín fagnaður mátti vera verandi í tykkum, og *at* tykkara fagnaður mátti vera fullur.

12 Hetta er boð mítt, At tit elskið hvør annan, eins og eg havi elskað tykkum.

13 Størri kærleika hevur eingin maður enn hendan, at ein maður leggi niður sítt lív fyri sínar vinir.

14 Tit eru mínir vinir, um tit geri hvatsumhelst *ið* eg bjóði tykkum.

15 Hiðanífrá kalli eg tykkum ikki tænarar; tí at tænarin veit ikki hvat harri hansara ger: men eg havi kallað tykkum vinir; tí at øll ting, sum eg havi hoyrt av Faðir mínum, havi eg gjørt kunn tykkum.

16 Tit hava ikki útvalt meg, men eg havi útvalt tykkum, og innsett tykkum, at tit skuldu fara og bera fram ávøkst, og *at* tykkar ávøkstur skuldi vara við: at hvatsumhelst tit skulu umbiðja av Faðirinum í navni mínum, hann kann geva tykkum tað.

17 Hesi ting bjóði eg tykkum, at tit elskið hvør annan.

18 Um heimurin hati tykkum, *tá* vita tit, at hann hataði meg, áðrenn *hann hataði* tykkum.

19 Um tit vóru av heiminum, vildi heimurin elskað sítt egna: men av tí at tit eru ikki av heiminum, men eg havi valt tykkum út úr heiminum, tí hatar heimurin tykkum.

20 Minnist orðið sum eg segði við tykkum, Tænarin er ikki størri enn harri hansara. Um teir havi søkt at mær, vilja teir eisini søkja at tykkum; um teir havi varðveitt mína framsøgn, vilja teir eisini varðveita tykkara.

21 Men øll hesi ting vilja teir gera tykkum fyri navns míns skuld, av tí at teir kenna ikki hann sum sendi meg.

22 Um eg ikki hevði komið og talað til teirra, høvdu teir ikki havt synd: men nú hava teir einkið skálkaskjól fyri sína synd.

23 Hann, ið hatar meg, hatar Faðir mín eisini.

24 Um eg ikki hevði gjørt teirra millum tey verk sum eingin annar maður gjørdi, høvdu teir ikki havt synd: men nú hava teir bæði sæð og hatað bæði meg og Faðir mín.

25 Men *hetta hendir, fyri* at orðið mátti verða uppfylt sum stendur skrivað í teirra lóg, Teir hataðu meg uttan grund.

26 Men tá ið Uggarin er komin, hvønn eg vil senda tykkum

frá Faðirinum, *enntá* sannleikans Andi, sum útgongur frá Faðirinum, hann skal vitna um meg:
27 Og tit eisini skulu bera vitnisburð, av tí at tit hava verið við mær frá byrjanini.

KAPITUL 16

HESI ting havi eg talað tykkum, at tit skuldu ikki fáa meinboga.
2 Teir skulu koyra tykkum út úr sýnagogunum: ja, tann tíð kemur, tá ið hvørsumhelst *ið* drepur tykkum, vil halda at hann ger Guði tænastu.
3 Og hesi ting vilja teir gera tykkum, av tí at teir hava ikki kent Faðirin, ella meg.
4 Men hesi ting havi eg sagt tykkum, at, tá ið tíðin skal koma, tit mega minnast at eg segði tykkum um tey. Og hesi ting segði eg ikki við tykkum frá byrjanini, av tí at eg var hjá tykkum.
5 Men nú fari eg mín veg til hansara sum sendi meg; og eingin tykkara spyr meg, Hvagar fert tú?
6 Men av tí at eg havi sagt hesi ting við tykkum, hevur sorg fylt tykkara hjarta.
7 Hóast hetta, eg sigi tykkum sannleikan; Tað er gagnligt fyri tykkum at eg fari avstað: tí at um eg fari ikki avstað, vil Uggarin ikki koma til tykkara; men um eg fari avstað, vil eg senda hann til tykkara.
8 Og tá ið hann er komin, vil hann írættaseta heimin um synd, og um rættvísi, og um dóm:
9 Um synd, av tí at teir trúgva ikki á meg;
10 Um rættvísi, av tí at eg fari til Faðirs míns, og tit síggja meg ikki meira;
11 Um dóm, av tí at prinsurin av hesum heimi er dømdur.
12 Eg havi enn mong ting at siga við tykkum, men tit kunnu ikki bera tey nú.
13 Hvussu enn er, tá ið hann, sannleikans Andi, er komin, hann vil leiða tykkum inn í allan sannleika: tí at hann skal ikki tala av sær sjálvum; men hvatsumhelst *ið* hann skal hoyra, *tað* skal hann tala: og hann vil sýna tykkum ting sum koma *skulu*.
14 Hann skal dýrðmeta meg: tí at hann skal móttaka av mínum, og skal sýna tykkum *tað*.
15 Øll ting, sum Faðirin hevur, eru míni: tí segði eg, at hann skal taka av mínum, og skal sýna tykkum *tað*.
16 Ein lítil stund, og tit skulu ikki sjá meg: og aftur, ein lítil stund, og tit skulu sjá meg, av tí at eg fari til Faðirin.
17 Tá søgdu *summir* av hansara lærusveinum sín ámillum, Hvat er hetta sum hann sigur við okkum, Ein lítil stund, og tit skulu ikki sjá meg: og aftur, ein lítil stund, og tit skulu sjá meg: og, Av tí at eg fari til Faðirin?
18 Teir søgdu tí, Hvat er hetta sum hann sigur, Ein lítil stund? vit duga ikki at skyna hvat hann sigur.
19 Nú, Jesus vitsti at teir vóru tráiligir at spyrja hann, og segði við teir, Fregnast tit tykkara millum um tað *sum* eg segði, Ein lítil stund, og tit skulu ikki sjá meg: og aftur, ein lítil stund, og tit skulu sjá meg?
20 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, At tit skulu gráta og harmast, men heimurin skal fegnast: og tit skulu vera sorgarfullir, men tykkara sorg skal verða vend yvirí gleði.
21 Ein kvinna, tá ið hon hevur verkir, hevur sorg, av tí at hennara tími er komin: men so skjótt sum hon er loyst frá barninum, minnist hon kvølina ei meira, fyri fagnað *um* at eitt man*sbarn* er borið í heimin.
22 Og tit nú tí hava sorg: men eg

vil síggja tykkum aftur, og tykkara hjarta skal fegnast, og tykkara frøi tekur eingin maður frá tykkum.

23 Og á tí degi skulu tit umbiðja meg einkið. Sanniliga, sanniliga, sigi eg tykkum, Hvatsumhelst tit skulu umbiðja Faðirin í mínum navni, hann vil geva *tað* tykkum.

24 Higartil hava tit umbiðið einkið í navni mínum: umbiðið, og tit skulu fáa, at tykkara gleði má vera full.

25 Hesi ting havi eg talað við tykkum í myndmálum: men tann tíð kemur, tá ið eg skal ikki meira tala við tykkum í myndmálum, men eg skal sýna tykkum greidligani um Faðirin.

26 Á tí degi skulu tit umbiðja í navni mínum: og eg sigi tykkum ikki at eg vil umbiðja Faðirin fyri tykkum:

27 Tí at Faðirin sjálvur elskar tykkum, av tí at tit hava elskað meg, og hava trúð at eg kom út frá Guði.

28 Eg kom fram frá Faðirinum, og eri komin inn í heimin: aftur fari eg frá heiminum, og fari til Faðirin.

29 Hansara lærusveinar søgdu við hann, Sí, nú talart tú greidliga, og talart einkið myndmál.

30 Nú eru vit vísir *í* at tú veitst allar lutir, og tarvarst ikki at nakar maður skuldi spurt teg: av hesum trúgva vit at tú komst fram frá Guði.

31 Jesus svaraði teimum, Trúgva tit nú?

32 Sí, tann tími kemur, ja, er nú komin, at tit skulu verða spjaddir, hvør maður til sítt egna, og skulu eftirlata meg einsamallan: og tó, eg eri ikki einsamallur, av tí at Faðirin er hjá mær.

33 Hesi ting havi eg talað tykkum, at í mær tit máttu hava frið. Í heiminum skulu tit hava trongslu: men verið við gott treyst; eg havi vunnið yvir heiminum.

KAPITUL 17

HESI orð talaði Jesus, og lyfti upp eygum sínum til himins, og segði, Faðir, tímin er komin; dýrðmet Son tín, at tín Sonur eisini má dýrðmeta teg:

2 Eins og tú hevurt givið honum mátt yvir øllum kjøti, at hann skuldi geva ævigt lív til so mangar sum tú hevurt givið honum.

3 Og hetta er ævigt lív, at teir máttu kenna teg — hin einasta sanna Guð, og Jesus Christ sum tú hevurt sent.

4 Eg havi dýrðmett teg á jørðini: eg havi fullgjørt verkið sum tú gavst mær at gera.

5 Og nú, O Faðir, dýrðmet tú meg hjá sjálvum tær sjálvum við teirri dýrd sum eg hevði hjá tær, áðrenn verøldin var.

6 Eg havi givið til kennar títt navn at teim monnum sum tú gavst mær út úr heiminum: tínir teir vóru, og tú gavst mær teir; og teir hava varðveitt títt orð.

7 Nú hava teir vitað, at øll ting, hvørjisumhelst *ið* tú hevurt givið mær, eru av tær.

8 Tí at eg havi givið teim orðini sum tú gavst mær; og teir hava tikið við *teimum,* og hava vitað vissuliga at eg kom út frá tær, og teir hava trúð at tú sendirt meg.

9 Eg biði fyri teimum: eg biði ikki fyri heiminum, men fyri teimum sum tú hevurt givið mær; tí at teir eru tínir.

10 Og allir mínir eru tínir, og tínir eru mínir; og eg eri dýrðmettur í teimum.

11 Og nú eri eg ikki meira í heiminum, men hesir eru í heiminum, og eg komi til tín. Heilagi Faðir, varðveit, gjøgnum títt egna navn teir, sum tú hevurt givið mær, at teir mega vera ēitt, eins og vit *eru.*

12 Meðan eg var hjá teimum í heiminum, varðveitti eg teir í

navni tínum: teir, sum tú gavst mær, havi eg varðveitt, og eingin av teimum er burturmistur, uttan glatanarsonurin; at skriftin mátti verða uppfylt.

13 Og nú komi eg til tín; og hesi ting tali eg í heiminum, at teir máttu hava mína gleði uppfylta í sær sjálvum.

14 Eg havi givið teim orð títt; og heimurin hevur hatað teir, av tí at teir eru ikki av heiminum, enntá eins og eg eri ikki av heiminum.

15 Eg biði ikki, at tú skuldirt tikið teir út úr heiminum, men at tú skuldirt varðveita teir frá tí illa.

16 Teir eru ikki av heiminum, enntá eins og eg eri ikki av heiminum.

17 Halga teir gjøgnum sannleika tín: orð títt er sannleiki.

18 Eins og tú hevurt sent meg inn í heimin, enntá soleiðis havi eg eisini sent teir inn í heimin.

19 Og fyri teirra sakir halgi eg meg sjálvan, at teir eisini máttu vera halgaðir gjøgnum sannleikan.

20 Eiheldur biði eg fyri hesum einsamøllum, men fyri teimum eisini sum skulu trúgva á meg gjøgnum orð teirra;

21 At teir allir mega vera ēitt; eins og tú, Faðir, *ert* í mær, og eg í tær, at teir eisini mega vera ēitt í okkum: at heimurin má trúgva at tú hevurt sent meg.

22 Og dýrdina, sum tú gavst mær, havi eg givið teimum; at teir mega vera ēitt, enntá eins og vit eru ēitt:

23 Eg í teimum, og tú í mær, at teir mega vera gjørdir fullkomnir í ēitt; og at heimurin má vita at tú hevurt sent meg, og hevurt elskað teir, eins og tú hevurt elskað meg.

24 Faðir, eg vil at teir eisini, sum tú hevurt givið mær, verði hjá mær har *sum* eg eri; at teir mega skoða mína dýrd sum tú hevurt givið mær: tí at tú elskaðirt meg, áðrenn grundlegging veraldarinnar.

25 O rættvísi Faðir, heimurin hevur ikki kent teg: men eg havi kent teg, og hesir hava vitað at tú hevurt sent meg.

26 Og eg havi kunngjørt teimum navn títt, og vil kunngera *tað:* at kærleikin, við hvørjum tú hevurt elskað meg, má vera í teimum, og eg í teimum.

KAPITUL 18

TÁ ið Jesus hevði talað hesi orð, fór hann út við sínum lærusveinum yvirum løkin Cē´-drōn, hvar var ein urtagarður, inn í hvønn hann fór, og hansara lærusveinar.

2 Og Judas eisini, sum sveik hann, kendi staðið: tí at Jesus mangan leitaði hagar við sínum lærusveinum.

3 Judas, havandi fingið eitt lið *av monnum* og tænastumonnum frá fremstu prestunum og Pharisēarunum, tá kemur hagar við lompum og faklum og vápnum.

4 Jesus tí vitandi øll ting sum skuldu koma omanyvir hann, fór fram, og segði við teir, Hvønn søkja tit?

5 Teir svaraðu honum, Jesus úr Nazareth. Jesus sigur við teir, Eg eri *hann.* Og Judas eisini, sum sveik hann, stóð hjá teimum.

6 So skjótt tá sum hann hevði sagt við teir, Eg eri *hann,* fóru teir aftureftir, og fullu til jarðarinnar.

7 Tá spurdi hann teir aftur, Hvønn søkja tit? Og teir søgdu, Jesus úr Nazareth.

8 Jesus svaraði, Eg havi sagt tykkum at eg eri *hann:* um tí tit søkja meg, latið hesar fara sín veg:

9 At framsøgnin mátti verða uppfylt, sum hann talaði, Av teimum, sum tú gavst mær, havi eg ongan mist.

10 Símun Pætur, havandi eitt svørð, tá brá tí, og sló tænaran hjá høvuðsprestinum, og skar av hansara høgra oyra. Navnið hjá tænaranum var Măl´-chŭs.

11 Tá segði Jesus við Pætur, Set upp svørð títt inn í slíðran: bikarið sum Faðir mín hevur givið mær, skal eg ikki drekka tað?

12 Liðið og høvuðsmaðurin og tænastumenninir hjá Jødunum tá tóku Jesus, og bundu hann,

13 Og leiddu hann avstað til Annasar fyrst; tí at hann var verfaðir til Cáï´-â-phäs-ar, sum var høvuðspresturin tað sama árið.

14 Nú, Cáï´-â-phäs var hann sum gav ráð til Jødanna, at tað var gagnligt at ēin maður skuldi doyggja fyri fólkið.

15 ¶ Og Símun Pætur fylgdi Jesusi, og *tað sama gjørdi* ein annar lærusveinur: tann lærusveinurin var kendur við høvuðsprestin, og fór inn við Jesusi inn í borgina hjá høvuðsprestinum.

16 Men Pætur stóð við dyrnar uttanfyri. Tá fór út hīn lærusveinurin, sum var kendur við høvuðsprestin, og talaði við hana sum varðaði hurðina, og førdi inn Pætur.

17 Tá sigur gentan, sum varðaði hurðina, við Pætur, Ert ikki tú eisini *ēin* av lærusveinunum hjá hesum manninum? Hann sigur, Eg eri ikki.

18 Og tænararnir og tænastumenninir stóðu har, hvørjir gjørt høvdu ein kolaeld; tí at tað var kalt: og teir vermdu seg sjálvar: og Pætur stóð hjá teimum, og vermdi seg sjálvan.

19 ¶ Høvuðspresturin tá spurdi Jesus um hansara lærusveinar, og um hansara Guðslæru.

20 Jesus svaraði honum, Eg talaði opinlýsliga fyri heiminum; eg alsamt lærdi í sýnagogunum, og í templinum, hvagar Jødarnir altíð leita; og í loyndum havi eg einkið sagt.

21 Hví spyrt tú meg? spyr teir sum hoyrdu meg, hvat eg havi sagt við teir: sí, teir vita hvat eg segði.

22 Og tá ið hann svá hevði talað, ēin av tænastumonnunum, sum stóðu hjá, sló Jesus við handalógva sínum, sigandi, Svarart tú høvuðsprestinum so?

23 Jesus svaraði honum, Um eg havi talað ilt, ber vitni um tað illa: men um væl, hví slært tú meg?

24 Nú, Annas hevði sent hann bundnan til Cáï´-â-phäs-ar høvuðsprests.

25 Og Símun Pætur stóð og vermdi seg sjálvan. Teir søgdu tí við hann, Ert ikki tú eisini *ēin* av hansara lærusveinum? Hann avnoktaði *tað*, og segði, Eg eri ikki.

26 Ēin av tænarum høvuðsprestsins, verandi skyldmaður *hansara* hvørs oyra Pætur skar av, sigur, Sá ikki eg teg í urtagarðinum við honum?

27 Pætur tá avnoktaði aftur: og í stundini gól hanin.

28 ¶ Tá leiddu teir Jesus frá Cáï´-â-phäs-i at dómshøllini: og tað var árla; og teir sjálvir fóru ikki inn í dómshøllina, at ikki teir skuldu verðið óreinskaðir; men at teir máttu etið umleypið.

29 Pilatus tá fór út til teirra, og segði, Hvørja ákæru føra tit ímóti hesum manninum?

30 Teir svaraðu og søgdu við hann, Um hann var ikki ein illgerðarmaður, vildu vit ikki havt givið hann upp til tygara.

31 Tá segði Pilatus við teir, Takið tit hann, og dømið hann samsvarandi við lóg tykkara. Jødarnir tessvegna søgdu við hann, Tað er ikki lógligt hjá okkum at taka nakran mann av lívi:

32 At Jesu framsøgn mátti verða uppfylt, sum hann talaði, uppmálandi hvønn deyða hann skuldi doyggja.

33 Tá fór Pilatus inn í dómshøllina aftur, og kallaði Jesus, og segði við hann, Ert tú Kongur Jødanna?

34 Jesus svaraði honum, Sigurt

tú hetta tingið av tær sjálvum, ella søgdu aðrir tær tað um meg?
35 Pilatus svaraði, Eri eg Jødi? Tín egna tjóð og teir fremstu prestarnir hava givið teg upp til mín: hvat hevurt tú gjørt?
36 Jesus svaraði, Kongadømi mítt er ei av hesum heimi: um mítt kongadømi var av hesum heimi, tá vildu tænarar mínir barst, at eg skuldi ei verðið givin upp til Jødanna: men nú er mítt kongadømi ikki haðani frá.
37 Pilatus tí segði við hann, Ert tú tá ein kongur? Jesus svaraði, Tú sigurt, at eg eri ein kongur. Til hesa endamáls varð eg føddur, og av hesi grund kom eg inn í heimin, at eg skuldi bera sannleikanum vitnisburð. Hvør tann, sum er av sannleikanum, hoyrir rødd mína.
38 Pilatus sigur við hann, Hvat er sannleiki? Og tá ið hann hetta hevði sagt, fór hann út aftur til Jødanna, og sigur við teir, Eg finni í honum ongan feil *yvirhøvur*.
39 Men tit hava eina venju, at eg skuldi lata tykkum ēin leysan á umleypinum: vilja tit tí, at eg lati tykkum Kong Jødanna leysan?
40 Tá rópaðu teir allir aftur, sigandi, Ikki henda mann, men Bâr´-ăb-băs. Nú, Bâr´-ăb-băs var ein ránsmaður.

KAPITUL 19

TÁ tessvegna tók Pilatus Jesus, og húðfletti *hann*.
2 Og hermenninir flættaðu eina krúnu av tornum, og settu *hana* á høvur hansara, og teir koyrdu á hann eina purpur skikkju,
3 Og søgdu, Heilur *og sælur,* Jøda Kongur! og teir slógu hann við sínum hondum.
4 Pilatus tí fór fram aftur, og sigur við teir, Sí, Eg føri hann fram til tykkara, at tit mega vita at eg finni ongan feil í honum.
5 Tá kom Jesus fram, ílatin tornakrúnuna, og purpur skikkjuna. Og *Pilatus* sigur við teir, Sjáið mannin!
6 Tá ið tí teir fremstu prestarnir og tænastumen*inir* sóu hann, rópaðu teir út, sigandi, Krossfest *hann,* krossfest *hann*. Pilatus sigur við teir, Takið tit hann, og krossfestið *hann:* tí eg finni ongan feil í honum.
7 Jødarnir svaraðu honum, Vit hava eina lóg, og eftir okkara lóg átti hann at doyð, av tí at hann gjørdi seg sjálvan *til* Son Guðs.
8 ¶ Tá ið Pilatus tí hoyrdi ta framsøgnina, varð hann tess meira ræddur;
9 Og fór aftur inn í dómshøllina, og sigur við Jesus, Hvaðan ert tú? Men Jesus gav honum einkið svar.
10 Tá sigur Pilatus við hann, Talart tú ikki við meg? veitst tú ikki, at eg havi vald at krossfesta teg, og havi vald at leyslata teg?
11 Jesus svaraði, Tú kundirt einkið vald havt *yvirhøvur* ímóti mær, uttan tað var tær givið úr erva: hann tí, sum gav meg upp til tín, hevur ta størru syndina.
12 Og haðanífrá royndi Pilatus at lata hann leysan: men Jødarnir rópaðu út, sigandi, Um tú lati henda mann fara, ert tú ikki vinur Cæsars: hvørsumhelst *ið* ger seg sjálvan *til* kong, talar ímóti Cæsar.
13 ¶ Tá ið Pilatus tí hoyrdi ta framsøgnina, førdi hann Jesus fram, og settist niður í dómstólin á einum staði sum er kallað Steinsetingin, men á Hebrāiskuni, Găb´-bă-thă.
14 Og tað var tilreiðing umleypsins, og um hin sætta tíma: og hann sigur við Jødarnar, Sjáið Kong tykkara!
15 Men teir rópaðu út, Burtur við *honum,* burtur við *honum,* krossfest hann. Pilatus sigur við teir, Skal eg krossfesta Kong tykkara? Fremstu prestarnir svaraðu, Vit hava ongan kong uttan Cæsar.

16 Tá gav hann hann tí yvir til teirra at verða krossfestan. Og teir tóku Jesus, og leiddu *hann* avstað.

17 Og hann, berandi sín kross, fór út á eitt stað, kallað skalla*staðið,* sum er kallað á Hebrāiskuni Gŏl′-gă-thă:

18 Har teir krossfestu hann, og tveir aðrar við honum, ēin hvørjumegin, og Jesus í miðjuni.

19 ¶ Og Pilatus skrivaði ein tittul, og setti *hann* á krossin. Og skriftin var, JESUS ÚR NAZARETH KONGUR JØDANNA.

20 Henda tittul tá lósu mangir av Jødunum: tí plássið, har Jesus varð krossfestur, var nær við staðin: og hann var skrivaður á Hebrāiskum, *og* Grikskum, *og* Latíni.

21 Tá søgdu teir fremstu prestar Jødanna til Pilatusar, Skriva ikki, Kongur Jødanna; men at hann segði, Eg eri Kongur Jødanna.

22 Pilatus svaraði, Tað *sum* eg havi skrivað, havi eg skrivað.

23 ¶ Hermenninir, tá ið teir høvdu krossfest Jesus, tá tóku hansara klæðir, og gjørdu fýra partar, til hvønn hermann ein part; og eisini *hansara* kyrtil: nú, kyrtilin var uttan seyming, vovin úr erva útígjøgn.

24 Teir søgdu tí sín ámillum, Latum okkum ikki skræða hann, men kasta lutir um hann, hvørs hann skal vera: at skriftin mátti verða uppfylt, sum sigur, Teir skiftu mín klædnað sín ámillum, og um mín kappa teir kastaðu lutir. Hesi ting tí gjørdu hermenninir.

25 ¶ Nú, har stóðu við Jesu kross móðir hansara, og móðursystir hansara, Maria — *kona* Clē′-ŏ-phās-ar; og Maria Măg-dă-lē′-nă.

26 Tá ið Jesus tí sá móður sína, og *tann* lærusveinin standandi hjá, sum hann elskaði, sigur hann við móður sína, Kvinna, sjá son tín!

27 Tá sigur hann við lærusveinin, Sjá tína móður! Og frá tí tíma tók tann lærusveinurin hana at sínum egna *heimi.*

28 ¶ Eftir hetta, Jesus vitandi at øll ting vóru nú fullførd, at skriftin mátti verða uppfylt, sigur, Meg tyrstir.

29 Nú, har var sett eitt ílat, fult av ediki: og teir fyltu ein svamp við ediki, og settu *hann* uppá ýsop, og settu *hann* til munn hansara.

30 Tá ið Jesus tí hevði tikið við edikinum, segði hann, Tað er fullgjørt: og hann boygdi sítt høvur, og gav upp andan.

31 Jødarnir tessvegna, av tí at tilreiðingin var, *fyri* at likamini skuldu ikki verða verandi uppiá krossinum á sabbatsdegnum, (tí at tann sabbatsdagurin var ein høgur dagur,) bønaðu Pilatus, at teirra leggir máttu verða brotnir, og *at* teir máttu verða tiknir burtur.

32 Tá komu hermenninir, og brutu leggirnar hjá tí fyrsta, og hjá hīnum sum var krossfestur við honum.

33 Men tá ið teir komu til Jesu, og sóu at hann var deyður longu, brutu teir ikki hansara leggir:

34 Men ēin av hermonnunum við einum spjóti gataði hansara síðu, og við tað sama kom tað út blóð og vatn.

35 Og hann, sum sá *tað,* gav frágreiðing; og hansara frágreiðing er sonn: og hann veit at hann sigur satt, at tit mega trúgva.

36 Tí at hesi ting vórðu gjørd, *fyri* at skriftin skuldi verða uppfylt, Eitt bein hjá honum skal ei verða brotið.

37 Og aftur sigur eitt annað skriftstað, Teir skulu hyggja á hann sum teir gataðu.

38 ¶ Og eftir hetta, Jóseph úr Âr-ĭ-mă-thæ′-ŭ, verandi ein lærusveinur Jesu, men loyniligani, av ótta fyri Jødunum, bønaði Pilatus, at hann mátti taka burtur Jesu likam: og Pilatus gav *honum* loyvi. Hann kom tí, og tók Jesu likam.

39 Og har kom eisini Nĭ-cō-dē´-mŭs, sum í fyrstani kom til Jesu um nátt*ina,* og kom við eini blanding av myrrhu og alōeum, um hundrað pund *í vekt.*

40 Tá tóku teir Jesu likam, og sveipaðu tað í línklæðum við hinum *angandi* kryddurtunum, sum háttarlag Jødanna er at jarða.

41 Nú, á tí staði, har hann varð krossfestur, var ein urtagarður; og í urtagarðinum eitt nýtt gravhýsi, hvarí aldri maður enn var lagdur.

42 Har løgdu teir Jesus tessvegna, vegna tilreiðingar*dags* Jødanna; tí at gravhýsið var nærhendis.

KAPITUL 20

HIN fyrsta *dagin* av vikuni kemur Maria Măg-dă-lē´-nă snimma, tá tað var enn myrkt, at gravhýsinum, og sær steinin tiknan burtur frá gravhýsinum.

2 Tá rennur hon, og kemur til Símun Pætur, og til hīn lærusveinin, sum Jesus elskaði, og sigur við teir, Teir hava tikið burt Harran út úr gravhýsinum, og vit vita ikki hvar teir hava lagt hann.

3 Pætur tí fór fram, og hīn lærusveinurin, og komu til gravhýsið.

4 So teir runnu báðir saman: og hīn lærusveinurin rann framum Pætur, og kom fyrstur til gravhýsið.

5 Og hann, hoykjandi niður, *og hyggjandi inn,* sá línklæðini liggjandi; tó fór hann ikki inn.

6 Tá kemur Símun Pætur, fylgjandi honum, og fór inn í gravhýsið, og sær línklæðini liggja,

7 Og sveittadúkin, sum var um høvur hansara, ikki liggjandi hjá línklæðunum, men ballaðan saman á einum staði fyri seg sjálvan.

8 Tá fór inn eisini hīn lærusveinurin, sum kom fyrstur til gravhýsið, og hann sá, og trúði.

9 Tí sum var skiltu teir ikki skriftina, at hann mátti rísa aftur frá teimum deyðu.

10 Tá fóru lærusveinarnir avstað aftur at sínum egna heimi.

11 ¶ Men Maria stóð uttanfyri við gravhýsið grátandi: og, sum hon græt, heyk hon niður, *og hugdi* inn í gravhýsið,

12 Og sær tveir einglar í hvítum sitandi, tann ēina við høvda-*lag*ið, og hīn við fóta*lag*ið, har Jesu likam hevði ligið.

13 Og teir siga við hana, Kvinna, hví grætur tú? Hon sigur við teir, Av tí at teir hava tikið burt Harra mín, og eg veit ikki hvar teir hava lagt hann.

14 Og tá ið hon svá hevði sagt, vendi hon sær tilbakar, og sá Jesus standandi, og vitsti ikki at tað var Jesus.

15 Jesus sigur við hana, Kvinna, hví grætur tú? hvønn søkirt tú? Hon, haldandi hann at vera urtagarðsmannin, sigur við hann, Harri, um tú havi borið hann hiðani, sig mær hvar tú hevurt lagt hann, og eg vil taka hann burt.

16 Jesus sigur við hana, Maria. Hon vendi sær, og sigur við hann, Răb-bō´-nī; sum vil siga, Meistari.

17 Jesus sigur við hana, Nem ikki við meg; tí at eg eri ikki enn stigin upp til Faðirs míns: men gakk til brøðra mína, og sig við teir, Eg stígi upp at Faðir mínum, og Faðir tykkara; og *til* Guðs míns, og Guðs tykkara.

18 Maria Măg-dă-lē´-nă kom og segði lærusveinunum at hon hevði sæð Harran, og *at* hann hevði talað hesi ting við hana.

19 ¶ Síðan hin sama dagin um aftan, verandi hin fyrsti *dagurin* av vikuni, tá hurðarnar vóru lokaðar har lærusveinarnir vóru savnaðir av ótta fyri Jødunum, kom Jesus og stóð í miðjuni, og sigur við teir, Friður *veri* at tykkum.

20 Og tá ið hann so hevði sagt, sýndi hann teimum hendur *sínar* og síðu sína. Tá vórðu lærusveinarnir glaðir, tá ið teir sóu Harran.

21 Tá segði Jesus til teirra aftur, Friður *veri* at tykkum: eins og Faðir *mín* hevur sent meg, enntá soleiðis sendi eg tykkum.

22 Og tá ið hann hetta hevði sagt, andaði hann á *teir,* og sigur við teir, Takið tit við Halga Andanum:

23 Hvørssumhelst syndir *ið* tit eftirgevi, tær eru eftirgivnar teimum; *og* hvørssumhelst *syndir ið* tit afturhaldi, tær eru afturhildnar.

24 ¶ Men Tummas, ēin av teimum tólv, kallaður Dĭ-dȳ-mŏs, var ikki hjá teimum tá ið Jesus kom.

25 Hīnir lærusveinarnir tí søgdu við hann, Vit hava sæð Harran. Men hann segði við teir, Uttan eg skal síggja í hansara hondum merkið av naglunum, og seti mín fingur inn í merkið av naglunum, og trýsti mína hond inn í hansara síðu, vil eg ikki trúgva.

26 ¶ Og eftir átta dagar vóru hansara lærusveinar aftur innanfyri, og Tummas við teimum: *tá* kom Jesus, dyrnar verandi lokaðar, og stóð í miðjuni, og segði, Friður *veri* at tykkum.

27 Tá sigur hann til Tummasar, Rætt higar fingur tín, og skoða hendur mínar; og rætt higar hond tína, og trýst *hana* inn í síðu mína: og ver ikki trútómur, men trúgvandi.

28 Og Tummas svaraði og segði við hann, Mín Harri og mín Guð.

29 Jesus sigur við hann, Tummas, av tí at tú hevurt sæð meg, hevurt tú trúð: vælsignaðir *eru* teir sum ei hava sæð, og *tó* hava trúð.

30 ¶ Og mong onnur tekin sanniliga gjørdi Jesus í nærveruni av sínum lærusveinum, sum eru ikki skrivað í hesi bók:

31 Men hesi eru skrivað, at tit mega trúgva at Jesus er Christus, Sonur Guðs; og at, trúgvandi, tit máttu hava lív gjøgnum navn hansara.

KAPITUL 21

EFTIR hesi ting sýndi Jesus seg aftur fyri lærusveinunum við Tĭ-bĕ´-rĭ-ăs-sjógvin; og á henda hátt sýndi hann *seg*.

2 Har vóru saman Símun Pætur, og Tummas — kallaður Dĭ´-dȳ-mŏs, og Nă-thăn´-ă-ĕl úr Cána í Galilēu, og *synir* Zĕb-ĕ-dēē´-ŭs-ar, og tveir aðrir av hansara lærusveinum.

3 Símun Pætur sigur við teir, Eg fari at fiska. Teir siga við hann, Vit eisini fara við tær. Teir fóru fram, og fóru inn í ein bát alt fyri eitt; og ta náttina fingu teir einkið.

4 Men tá ið morgunin var nú komin, stóð Jesus á sjóvarmálanum: men lærusveinarnir vitstu ikki at tað var Jesus.

5 Tá sigur Jesus við teir, Børn, hava tit nakran mat? Teir svaraðu honum, Nei.

6 Og hann segði við teir, Kastið nótina høgrumegin við bátin, og tit skulu fáa. Teir kastaðu tí, og nú vóru teir ikki førir fyri at draga hana fyri fjøldini av fiskum.

7 Tessvegna tann lærusveinurin, sum Jesus elskaði, sigur við Pætur, Tað er Harrin. Nú, tá ið Símun Pætur hoyrdi, at tað var Harrin, gyrdi hann fiskimanskyrtilin *hjá sær at sær,* (tí hann var nakin,) og kastaði seg inn í sjógvin.

8 Og hīnir lærusveinarnir komu í einum lítlum báti; (tí at teir vóru ikki langt frá landi, men sum vóru tað tvey hundrað alnir,) dragandi nótina við fiskum.

9 So skjótt sum teir tá vóru komnir í land, sóu teir ein kolaeld har, og fisk lagdan hará, og breyð.

10 Jesus sigur við teir, Komið við av fiskinum sum tit nú hava fingið.

11 Símun Pætur fór upp, og dró nótina í land, fulla av stórum fiskum, eitt hundrað og fimti og trimum: og fyri alt har vóru so mangir, tó varð ikki nótin skrødd.

12 Jesus sigur við teir, Komið *og* etið. Og eingin av lærusveinunum tordi spyrja hann, Hvør ert tú? vitandi at tað var Harrin.
13 Jesus tá kemur, og tekur breyð, og gevur teimum, og fisk somuleiðis.
14 Hetta er nú triðja ferðin sum Jesus sýndi seg fyri sínum lærusveinum, eftir at hann var risin frá teimum deyðu.
15 ¶ So tá ið teir høvdu etið, sigur Jesus við Símun Pætur, Símun, *sonur* Jónasar, elskart tú meg meir enn hesir? Hann sigur við hann, Ja, Harri; tú veitst at eg elski teg. Hann sigur við hann, Føð lomb míni.
16 Hann sigur við hann aftur *fyri* aðru ferð, Símun, *sonur* Jónasar, elskart tú meg? Hann sigur við hann, Ja, Harri; tú veitst at eg elski teg. Hann sigur við hann, Føð seyð mín.
17 Hann sigur við hann *fyri* triðju ferð, Símun, *sonur* Jónasar, elskart tú meg? Pætur varð harmur, av tí at hann segði við hann *fyri* triðju ferð, Elskart tú meg? Og hann segði við hann, Harri, tú veitst øll ting; tú veitst at eg elski teg. Jesus sigur við hann, Føð seyð mín.
18 Sanniliga, sanniliga, sigi eg tær, Tá ið tú vart ungur, gyrdirt tú teg, og gekst hvagar tú vildirt: men tá ið tú skalt verða gamalur, skalt tú rætta fram tínar hendur, og ein annar skal gyrða teg, og bera *teg* hvagar tú vildirt ei.
19 Hetta talaði hann, uppmálandi viðˆ hvørjum deyða hann skuldi dýrðmeta Guð. Og tá ið hann hetta hevði talað, sigur hann við hann, Fylg mær.
20 Pætur tá, vendandi *sær* runt, sær lærusveinin, sum Jesus elskaði, fylgjandi; sum eisini lenaðist á hansara bróst við kvøldmáltíð*ina,* og segði, Harri, hvør er hann ið svíkur teg?
21 Pætur, síggjandi hann, sigur við Jesus, Harri, og hvat *skal* hesin maður *gera?*
22 Jesus sigur við hann, Um eg vil at hann dvølji til eg komi, hvat *er* tær um *tað?* fylg tú mær.
23 Tá fór henda framsøgn útumkring millum brøðranna, at tann lærusveinurin skuldi ikki doyggja: tó segði Jesus ikki við hann, Hann skal ikki doyggja; men, Um eg vil at hann dvølji til eg komi, hvat *er* tær um *tað?*
24 Hetta er tann lærusveinurin sum vitnar um hesi ting, og skrivaði hesi ting: og vit vita at hansara vitnisburður er sannur.
25 Og tað eru eisini mong onnur ting sum Jesus gjørdi, hvørji, um tey skuldu verðið skrivaði hvørt *og* ēitt, haldi eg at sjálvt heimurin sjálvur kundi ikki rúmað teim bókunum sum høvdu verðið skrivaðar. Ǻ-mēn.

GERNINGAR ÁPOSTLANNA.

KAPITUL 1

TAÐ fyrra ritið havi eg gjørt, O Thē-ŏ'-phī-lŭs, um alt *tað* sum Jesus byrjaði bæði at gera og frálæra,
2 Inntil tann dag, í hvørjum hann varð tikin upp, eftir at hann, gjøgnum Halga Andan, hevði givið ápostlunum boðˇ, hvørjum hann hevði útvalt:
3 Fyri hvørjum eisini hann sýndi seg livandi eftir sína líðing við mongum ósvitaligum prógvum, verðandi sæddur av teimum *í* fjøruti dagar, og talandi um

tingini, hoyrandi til kongadømis Guðs:

4 Og, verandi savnaður saman við *teimum,* beyð teimum at teir skuldu ikki fara avstað frá Jerusalem, men bíða eftir fyrijáttan Faðirsins, sum, *sigur hann,* tit hava hoyrt av mær.

5 Tí Jóhannes sanniliga doypti við vatni; men tit skulu verða doyptir við Halga Andanum ikki mangar dagar herfrá.

6 Tá ið teir tí vóru komnir saman, spurdu teir av honum, sigandi, Harri, vilt tú á hesi tíð endurbøta aftur kongadømið til Ísraels?

7 Og hann segði við teir, Tað er ikki fyri tykkum at vita tíðirnar ella tíðarskeiðini, sum Faðirin hevur sett í sínum egna mátti.

8 Men tit skulu fáa kraft, eftir at Halgi Andin er komin uppá tykkum: og tit skulu vera mær vitnir bæði í Jerusalem, og í allari Judæu, og í Sa-már-í-u, og at ytsta parti jarðarinnar.

9 Og tá ið hann hevði talað hesi tingini, meðan teir skoðaðu, varð hann tikin upp; og eitt skýggj tók ímóti honum út úr eygsjón teirra.

10 Og meðan teir hugdu støðufastligani ímóti himni, sum hann fór upp, sí, tveir menn stóðu hjá teimum í hvítum klædnaði;

11 Hvørjir eisini søgdu, Tit Galilēu-menn, hví standa tit og stara upp inn í himin? hesin sami Jesus, sum er tikin upp frá tykkum inn í himin, skal soleiðis koma á líkan hátt sum tit hava sæð hann fara inn í himin.

12 Tá vendu teir aftur inn í Jerusalem frá fjallinum, kallað Olivin, sum er frá Jerusalem eina sabbatsdags ferð.

13 Og tá ið teir vóru komnir inn, fóru teir upp í eitt ovara rúm, hvar vórðu *verandi* bæði Pætur, og Jákob, og Jóhannes, og Andreas, Philippus, og Tummas, Bartholomæus, og Matthæus; Jákob, *sonur* Al-phæ-ūs-ar; og Símun Zê-lō-tēs; og Judas, *bróðir* Jákobs.

14 Allir hesir hildu áfram við einum samljómi í bøn og áheitan; við kvinnunum; og Mariu, móður Jesu; og við brøðrum hansara.

15 ¶ Og í teimum døgum stóð Pætur upp í miðju lærusveinanna, og segði, (talið á nøvnum saman vóru umleið hundrað og tjúgu,)

16 Menn *og* brøður, hetta skriftstaðið mátti neyðugt hava verðið uppfylt, hvørt Halgi Andin, við munni Dávids, frammanundan talaði viðvíkjandi Judasi, sum varð leiðbeinari fyri teimum sum tóku Jesus.

17 Tí at hann var taldur við okkum, og hevði lutast part í hesi tænastu.

18 Nú, hesin maðurin keypti ein akur við misgerðar-endurgjaldinum; og, fallandi eftir høvdinum, brast hann sundur í miðjuni, og allir innvølir hansara gustu út.

19 Og tað varð kunnugt øllum búsitarunum í Jerusalem; so mikið, at tann akurin verður kallaður á teirra egnu tungu, Â-kĕl-dā-má, tað vil siga, Blóðs-akurin.

20 Tí at skrivað stendur í Psálmabókini, Lat hansara bústað vera oydnan, og lat ongan mann búgva hari: og hansara biskupsembæti lat ein annan taka.

21 Hvørsvegna av hesum monnum, sum hava fylgst við okkum alla ta tíð sum Harrin Jesus fór inn og út okkara millum,

22 Byrjandi frá dópi Jóhannesar, at hinum sama degi sum hann varð tikin upp frá okkum, má ein verða innsettur at vera eitt vitni við okkum um uppreisn hansara.

23 Og teir útnevndu tveir, Józeph, kallaður Bár-sa-bas, ið varð tilnevndur Justus; og Mătth-ī-as.

24 Og teir bóðu, og søgdu, Tú, Harri, sum kennirt hjørtuni á øllum *monnum,* sýn hvønn av hesum tveim tú hevurt valt,

25 At hann má taka part í hesi tænastu og ápostladømi, frá hvørjum Judas viðˆ misgerð fell, at hann mátti fara til sítt egna stað.
26 Og teir góvu fram sínar lutir; og luturin fell uppá Mătth-ĭ´ăs; og hann varð upptaldur við teimum ellivu ápostlunum.

KAPITUL 2

OG tá ið Hvítusunnudagurin var full*vegis* komin, vóru tey øll við ēinum samljómi í ēinum plássi.
2 Og brádliga kom tað eitt ljóð frá himni, sum av einum súsandi, mektigum vindi, og tað fylti alt húsið har tey sótu.
3 Og tað birtust teimum klovnar tungur líka sum av eldi, og tað settist uppá hvønn av teimum.
4 Og tey vórðu øll fylt við Halga Andanum, og tóku at tala við øðrum tungum, *so* sum Andin gav teim framburð.
5 Og tað vóru búgvandi í Jerusalem Jødar, frómir menn, út úr hvørji tjóð undir himni.
6 Nú, tá ið hetta varð larmað útumkring, kom mannfjøldin saman, og vóru ørkymlaðir, av tí at hvør maður hoyrdi teir tala á sínum egna tungumáli.
7 Og teir vórðu allir ógvaðir og undraðust, sigandi hvør til annan, Sí, eru ikki allir hesir, ið tala, Galilæarar?
8 Og hvussu hoyra vit hvør maður á okkara egnu tungu, í hvørji vit vórðu føddir?
9 Păr´-thăr, og Mēdar, og Ē-lămĭt´-ar, og búsitararnir í Mē-sō-pō-tă´-mĭ-ŭ, og í Judæu, og Căp-pă-dō´-cĭ-ŭ, í Pontus, og Asiu,
10 Phrý´-gĭ-ŭ, og Păm-phý´-lĭ-ŭ, í Egyptalandi, og í pørtunum av Lĭ´-bў-ŭ kring Cý-rē´-nē, og fremmandir úr Róm, Jødar og prosilýttar,
11 Cretoyingar og Arabarar, vit hoyra teir tala á tungum várum hini undurfullu verk Guðs.
12 Og teir vórðu allir ógvaðir, og vóru í iva, sigandi hvør til annan, Hvat merkir hetta?
13 Aðrir háðandi søgdu, Hesir menn eru fullir av nýggjum víni.
14 ¶ Men Pætur, standandi upp við teimum ellivu, lyfti upp sína rødd, og segði við teir, Tit menn úr Judæu, og allir *tit* sum búgva í Jerusalem, veri hetta kunnugt tykkum, og lýðið á míni orð:
15 Tí at hesir eru ikki druknir, sum tit halda, við tað at tað er *einans* triðji tími dagsins.
16 Men hetta er tað, sum varð talað viðˆ prophetinum Jó´-ĕl;
17 Og tað skal henda í teimum síðstu døgunum, sigur Guð, *at* eg vil hella út av Anda mínum uppá alt kjøt: og tykkara synir og tykkara døtur skulu prophetera, og tykkara ungu menn skulu síggja sjónir, og tykkara gomlu menn skulu droyma dreymar:
18 Og á mínar tænarar og á mínar tænastumoyggjar vil eg hella út í teimum døgum av Anda mínum; og tey skulu prophetera:
19 Og eg vil sýna undurˇ í himni í erva, og tekinˇ á jørðini í neðra; blóð, og eld, og guvuroyk:
20 Sólin skal verða broytt í myrkur, og mánin í blóð, áðrenn hin mikli og merkisverdi dagur Harrans komi:
21 Og tað skal bera á, *at* hvørsumhelst *ið* skal kalla á navn Harrans, skal verða frelstur.
22 Tit menn av Ísrael, hoyrið hesi orð; Jesus úr Nazareth, ein maður — viðurkendur av Guði tykkara millum við kraftarverkum og undrum og teknum, hvørji Guð gjørdi viðˆ honum í tykkara mittu, eins og tit sjálvir eisini vita:
23 Hann, verðandi givin upp viðˆ fyriskipaða ráði og fyrivitan Guðs, hava tit tikið, og hava viðˆ vondum hondum krossfest og vigið:

24 Hvønn Guð hevur reist upp, havandi loyst pínur deyðans: av tí at tað var ikki møguligt at hann skuldi verðið hildin av honum.
25 Tí at Dávid talar viðvíkjandi honum, Eg fyrisá Harran altíð frammi fyri andliti mínum, tí at hann er við mína høgru hond, at eg skuldi ei verðið vikaður:
26 Tí fegnaðist mítt hjarta, og mín tunga var glað; harafturat eisini skal kjøt mítt hvíla í vón:
27 Av tí at tú vilt ikki eftirlata mína sál í helviti, eiheldur vilt tú tillata Hinum Heilaga tínum at síggja rot.
28 Tú hevurt gjørt kunnar fyri mær lívsins vegir; tú skalt gera meg fullan av frøi við tíni ásjón.
29 Menn *og* brøður, latið meg frælsliga tala við tykkum um ættarfaðirin Dávid, at hann er bæði deyður og jarðaður, og hansara gravhýsi er hjá okkum at hesum degi.
30 Tessvegna verandi ein prophetur, og vitandi at Guð hevði svorið við einum eiði til hansara, at av ávøkstinum av hansara lendum, samsvarandi við kjøtið, vildi hann reisa upp Christ til at sita á hásæti hansara;
31 Hann, síggjandi hetta frammanundan, talaði um uppreisn Christs, at hansara sál varð ikki eftirlatin í helviti, eiheldur sá hansara kjøt rot.
32 Henda Jesus hevur Guð reist upp, hvarum vit allir eru vitnir.
33 Tessvegna verandi viðˇ Guðs høgru hond upphevjaður, og havandi fingið av Faðirinum fyrijáttan Halga Andans, hevur hann úthelt hendan, sum tit nú síggja og hoyra.
34 Tí at Dávid er ikki stigin upp inn í himnarnar: men hann sigur sjálvur, HARRIN segði við Harra mín, Sit tú við høgru hond mína,
35 Inntil eg geri tínar figgindar *til* fótskammul tín.
36 Lat tí alt Ísraels hús vita vissuligani, at Guð hevur gjørt tann sama Jesus, hvønn tit hava krossfest, bæði *til* Harra og Christ.
37 ¶ Nú, tá ið teir hoyrdu *hetta,* fingu teir sting í sítt hjarta, og søgdu við Pætur og til restina av ápostlunum, Menn *og* brøður, hvat skulu vit gera?
38 Tá segði Pætur við teir, Vendið um, og verðið doyptir hvør *og* ēin av tykkum í navni Jesu Christs til eftirgeving syndanna, og tit skulu fáa gávu Halga Andans.
39 Tí at fyrijáttanin er fyri tykkum, og til børn tykkara, og til øll sum eru langt burturi frá, *enntá* so mong sum Harrin Guð vár skal kalla.
40 Og við mongum øðrum orðum vitnaði og formanaði hann, sigandi, Bjargið tykkum frá hesi rangvørgu ætt.
41 ¶ Tey, sum tá gleðiliga tóku ímóti orði hansara, vórðu doypt: og tann sama dagin vórðu lagdar afturat *teimum* umleið trý túsund sálir.
42 Og tey hildu áfram støðufastligani í ápostlanna Guðslæru og samfelagi, og í breyðbróting, og í bønum.
43 Og ótti kom uppá hvørja sál: og mong undurˇ og tekinˇ vórðu gjørd av ápostlunum.
44 Og øll, sum trúðu, vóru saman, og høvdu øll ting felags;
45 Og seldu sínar ognir og góðs, og deildu tey til allar *menn,* sum hvør maður hevði tørv.
46 Og tey, haldandi áfram dagligani við ēinum samljómi í templinum, og brótandi breyð frá húsi til húss, ótu sín mat við gleði og ēinfaldni hjartans,
47 Prísandi Guði, og havandi yndi hjá øllum fólkinum. Og Harrin legði afturat kirkjuni dagligani slík sum skuldu verða frelst.

KAPITUL 3

NÚ, Pætur og Jóhannes fóru niðan saman inn í templið um bønartíman, *sum er* hin níggjundi *tímin*.

2 Og ein ávísur maður, lamin frá móðurlívi móður sínar, varð borin, hvønn teir løgdu dagligani við tað portrið av templinum sum kallast Fagra, at biðja olmussur av teimum ið gingu inn í templið;

3 Hvør, síggjandi Pætur og Jóhannes, um at fara inn í templið, bað um eina olmussu.

4 Og Pætur, festandi síni eygu uppá hann, við Jóhannesi, segði, Hygg á okkum.

5 Og hann gav gætur at teimum, væntandi at móttaka okkurt av teimum.

6 Tá segði Pætur, Silvur og gull havi eg einkið; men slíkt, sum eg havi, gevi eg tær: Í navni Jesu Christs úr Nazareth, rís upp og gakk.

7 Og hann tók í høgru hondina á honum, og lyfti *hann* upp: og í stundini móttóku hansara føtur og øklabeinˇ styrki.

8 Og hann, loypandi upp, stóð, og gekk, og fór inn við teimum í templið, gangandi, og loypandi, og prísandi Guði.

9 Og alt fólkið sá hann gangandi og prísandi Guði:

10 Og tey vitstu, at tað var hann sum sat fyri olmussur við Fagra portrið av templinum: og tey vórðu fylt við undran og ógvan yvir tað sum hevði hent hann.

11 Og sum tann lamni maðurin, sum varð grøddur, helt Pæturi og Jóhannesi, rann alt fólkið saman at teimum í súlnaganginum sum er kallaður Sálomons, stórliga undrandi.

12 ¶ Og tá ið Pætur sá *tað,* tók hann til orða við fólkið, Tit menn av Ísrael, hví undrast tit á hetta? ella hví hyggja tit so álvarsamligani á okkum, sum um við okkar egna mátti ella heilagleika vit høvdu fingið henda mann at ganga?

13 Guð Ábrahams, og Ísaaks, og Jákobs, Guð fedra vára, hevur dýrðmett Son sín Jesus; hvønn tit góvu upp, og avnoktaðu hann í nærveruni av Pilatusi, tá ið hann var avráddur *í* at lata *hann* fara.

14 Men tit avnoktaðu Hin Heilaga og hin Rættvísa, og bóðu um ein myrðara at verða veittan tykkum;

15 Og drópu Prins lívsins, hvønn Guð hevur reist frá teimum deyðu; hvarum vit eru vitnir.

16 Og navn hansara, gjøgnum trúgv á navn hansara, hevur gjørt henda mann sterkan, hvønn tit síggja og kenna: ja, trúgvin, sum er av honum, hevur givið honum henda fullkomna sunnleika í nærveru tykkar alra.

17 Og nú, brøður, eg veit at gjøgnum fákunnu gjørdu tit *tað,* eins og *gjørdu* eisini ráðharrar tykkara.

18 Men tey tingini sum Guð frammanundan hevði sýnt viðˇ munninum á øllum prophetum sínum, at Christus skuldi líða, hevur hann soleiðis uppfylt.

19 ¶ Skiftið tit sinni tessvegna, og verðið umvendir, at tykkara syndir mega verða slettaðar út, tá ið tíðirnar av endurfriskan skulu koma frá nærveru Harrans;

20 Og hann skal senda Jesus Christ, sum frammanundan varð prædikaður tykkum:

21 Hvørjum himinin má taka ímóti, inntil tíðirnar av endurreisn av øllum tingum, sum Guð hevur talað viðˇ munninum á øllum sínum heilagu prophetum, síðan verøldin byrjaði.

22 Tí at Móses sanniliga segði við fedrarnar, Ein prophet skal Harrin Guð tykkara reisa tykkum upp av brøðrum tykkara, mær líkan; hann skulu tit hoyra

í øllum tingum, hvørjisumhelst *ið* hann skal siga tykkum.

23 Og tað skal bera á, *at* hvør sál sum vil ikki hoyra tann prophetin, skal verða oydd burturúr fólkinum.

24 Ja, og allir prophetarnir frá Sámueli, og teir sum aftaná fylgja, so mangir sum hava talað, hava líkaleiðis frammanundan sagt frá um hesar dagar.

25 Tit eru børn prophetanna, og sáttmálans sum Guð gjørdi við fedrar várar, sigandi við Abraham, Og í sáði tínum skulu allar ættir jarðarinnar verða vælsignaðar.

26 Tykkum *hevur* Guð fyrst, havandi reist upp Son sín Jesus, sent hann at vælsigna tykkum, í *at* venda burtur hvør *og* ēin av tykkum frá sínum misgerðum.

KAPITUL 4

OG, sum teir talaðu yvirat fólkinum, komu prestarnir, og høvuðsmaðurin av templinum, og Săd-dû-cēē´-ararnir uppá teir,

2 Verandi harmir at teir lærdu fólkið, og prædikaðu gjøgn Jesus uppreisnina frá teimum deyðu.

3 Og teir løgdu hendur á teir, og settu *teir* í varðhald at næsta deginum: tí at tað var nú aftanstíð.

4 Hvussu enn er, mong av teimum, ið hoyrdu orðið, trúðu; og talið á monnunum var umleið fimm túsund.

5 ¶ Og tað bar á um morgunin, at teirra stjórnarar, og elstu, og skriftlærdu,

6 Og høvuðspresturin Annas, og Cāĭ´-â-phăs, og Jóhannes, og Alexander, og so mangir sum vóru av høvuðsprestsins ætt, vóru savnaðir saman í Jerusalem.

7 Og tá ið teir høvdu sett teir í miðjuna, spurdu teir, Við hvørjum mátti, ella við hvørjum navni, hava tit gjørt hetta?

8 Pætur, fyltur við Halga Andanum, tá segði við teir, Tit stjórnarar fólksins, og Ísraels elstu,

9 Um vit henda dag verða rannsakaðir um hina góðu gerð, gjørd við hin vanmáttiga mannin, við hvørjum háttarlagi hann er gjørdur heilur;

10 Veri tað kunnugt tykkum øllum, og fyri øllum fólki Ísraels, at við navni Jesu Christs úr Nazareth, hvønn tit krossfestu, hvønn Guð reisti frá hinum deyðu, *enntá* við honum stendur hesin maður her frammanfyri tykkum heilur.

11 Hesin er tann steinurin sum varð gjørdur til einkiðs av tykkum smiðum, sum er vorðin høvuðs horn*steinurin*.

12 Eiheldur er tað frelsa í nøkrum øðrum: tí at tað er einkið annað navn undir himni, givið millum manna, hvarvið vit mugu verða frelstir.

13 ¶ Nú, tá ið teir sóu dirvið hjá Pæturi og Jóhannesi, og varnaðust at teir vóru ólærdir og fákunnigir menn, undraðust teir; og teir komust við teir, at teir høvdu verið við Jesusi.

14 Og skoðandi mannin, sum varð grøddur, standandi hjá teimum, kundu teir einkið siga ímóti tí.

15 Men tá ið teir høvdu boðið teimum at fara til viks út úr ráðinum, ráðførdust teir sín ámillum,

16 Sigandi, Hvat skulu vit gera við hesar menn? tí at *tað*, at í royndog *veru* eitt merkisvert kraftarverk hevur verðið gjørt av teimum, *er* eyðsýnt fyri øllum teimum sum búgva í Jerusalem; og vit kunnu ikki avnokta *tað*.

17 Men at tað spreiðist einkið víðari millum fólkið, latum okkum hótta teir strangliga, at teir hiðanífrá tali fyri ongum manni í hesum navni.

18 Og teir kallaðu teir, og skipaðu teimum ikki at tala yvirhøvur ella frálæra í Jesu navni.

19 Men Pætur og Jóhannes svaraðu og søgdu við teir, Hvørt tað

veri *seg* rætt í eygsjón Guðs at lýða tykkum meir enn Guð, dømið tit.
20 Tí at vit kunnu ikki *annað* enn tala tey ting sum vit hava sæð og hoyrt.
21 So tá ið teir høvdu víðari hótt teir, lótu teir teir fara, finnandi einkið hvussu teir máttu revsað teir, uppá grund av fólkinum: tí at allir *menn* dýrðmettu Guð fyri tað sum var gjørt.
22 Tí at maðurin var yvir fjøruti ára gamalur, á hvørjum hetta kraftarverk av grøðing var sýnt.
23 ¶ Og, verandi latnir fara, fóru teir til sítt egna samlag, og boðaðu frá øllum sum teir fremstu prestarnir og elstu høvdu sagt við teir.
24 Og tá ið teir hoyrdu tað, lyftu teir upp sína rødd til Guðs við ēinum samljómi, og søgdu, Harri, tú *ert* Guð, sum hevurt gjørt himin, og jørð, og sjógvin, og alt sum í teim er:
25 Sum^{p} viˆ munni tænara tíns Dávids hevurt sagt, Hví leikaðu hinir heidnu óðir, og *hví* ímyndar fólkið fáfongdar lutir?
26 Jarðarinnar kongar stóðu upp, og stjórnararnir vóru savnaðir saman ímóti Harranum, og ímóti Christi hansara.
27 Tí av sonnum ímóti tínum heilaga barni Jesusi, hvønn tú hevurt salvað, bæði Heródes, og Pontius Pilatus, *saman* við Heidningunum, og fólki Ísraels, vóru savnaðir saman,
28 Fyri at gera hvatsumhelst *ið* hond tín og ráð títt avráddu fyrifram at verða gjørt.
29 Og nú, Harri, lít at teirra hóttanum: og veit tínum tænarum, at við øllum dirvi teir mega tala títt orð,
30 Við at rætta fram tína hond at grøða; og at tekinˇ og undurˇ mega verða gjørd viˆ navni heilaga barns tíns Jesu.
31 ¶ Og tá ið teir høvdu biðið, varð staðið rist, har teir vóru savnaðir saman; og teir vórðu allir fyltir við Halga Andanum, og teir talaðu Guðs orð við dirvi.
32 Og fjøldin av teimum, sum trúðu, vóru av ēinum hjarta og av ēinari sál: eiheldur segði nakar *av teimum*, at nakað av tingunum, sum hann átti, var hans egna; men teir høvdu øll ting felags.
33 Og við miklari kraft bóru ápostlarnir vitni um uppreisn Harrans Jesu: og mikil náði var uppiá teim øllum.
34 Eiheldur var tað nakar teirra millum sum tørvaði: tí at so mangir, sum vóru eigarar av jørðum ella húsum, seldu tey, og komu við virðunum á teim tingunum sum vórðu seld,
35 Og løgdu *tað* niður við føtur ápostlanna: og útdeiling varð gjørd hvørjum manni samsvarandi sum hann hevði tørv.
36 Og Jó´-sēs, sum av ápostlunum varð tilnevndur Barnabas, (hvørt er, verðandi týtt, Ugganarsonurin,) ein Levitur, *og* úr landi Cýprosar,
37 Havandi jørð, seldi *hana*, og kom við peninginum, og legði *hann* við føtur ápostlanna.

KAPITUL 5

MEN ein ávísur maður, nevndur Ăn-ă-nī´-ăs, við Săpph-ī´-rū, konu síni, seldi eina ogn,
2 Og helt aftur *part* av virðinum, hans kona eisini verandi loynilig *til tess*, og kom við einum ávísum parti, og legði *tað* við føtur ápostlanna.
3 Men Pætur segði, Ăn-ă-nī´-ăs, hví hevur Satan fylt títt hjarta at lúgva fyri Halga Andanum, og at halda aftur *part* av virðinum á jørðini?
4 Meðan hon varð verandi, var hon ikki tín egna? og eftir *at* hon var seld, var hon ikki í tínum egna mátti? hví hevurt tú gitið henda

lut í hjarta tínum? tú hevurt ikki logið fyri monnum, men fyri Guði.

5 Og Ăn-ă-nī´-ăs, hoyrandi hesi orð, fell niður, og gav upp andan: og mikil ótti kom á allar teir sum hoyrdu hesar lutir.

6 Og teir ungu menninir reistust, vældu um hann, og bóru *hann* út, og jarðaðu *hann*.

7 Og tað var umleið skeiðið á tríggjar tímar aftaná, tá ið kona hansara, ei vitandi hvat var gjørt, kom inn.

8 Og Pætur tók til orða við hana, Sig mær hvørt tit seldu jørðina fyri so mikið? Og hon segði, Ja, fyri so mikið.

9 Tá segði Pætur við hana, Hvussu er tað, at tit hava samst saman at freista Anda Harrans? sí, føtur teirra, sum hava jarðað mann tín, *eru* við dyrnar, og skulu bera teg út.

10 Tá fell hon niður beinanvegin við hansara føtur, og gav upp andan: og teir ungu menninir komu inn, og funnu hana deyða, og, berandi *hana* fram, jarðaðu *hana* hjá manni hennara.

11 Og mikil ótti kom uppá alla kirkjuna; og uppá so mong sum hoyrdu hesar lutir.

12 ¶ Og viðˆ hondum ápostlanna vórðu mong tekinˇ og undurˇ virkaði millum fólkið; (og teir vóru allir við ēinum samljóði í súlnagangi Sálomons.

13 Og av restini tordi eingin maður *at* sameina seg til teirra: men fólkið setti teir hátt.

14 Og trúgvandi vórðu tess fleiri løgd afturat Harranum, fjøldir bæði av monnum og kvinnum.)

15 So mikið at tey førdu fram hini sjúku útá gøturnar, og løgdu *tey* á sengur og legur, at í minsta lagi skuggin av Pæturi, farandi framvið, mátti skuggað yvir summi teirra.

16 Har kom eisini ein fjøld *út* úr staðunum runt umkring til Jerusalem, havandi við sær sjúk fólk, og tey sum vóru plágaði við óreinum andum: og tey vórðu grødd hvør *og* ēin.

17 ¶ Tá reis upp høvuðspresturin, og allir teir sum við honum vóru, (sum er sekt Săd-dû-cēē´-aranna,) og vóru fyltir við harmavreiði,

18 Og løgdu sínar hendur á ápostlarnar, og settu teir í tað almenna fongslið.

19 Men eingil Harrans um nátt*ina* opnaði fongsulsdyrnar, og førdi teir út, og segði,

20 Farið, standið og talið í templinum til fólkið øll orðini av hesum lívi.

21 Og tá ið teir hoyrdu *tað,* fóru teir inn í templið árla um morgunin, og frálærdu. Men høvuðspresturin kom, og teir sum við honum vóru, og kallaði ráðið saman, og alt stjórnarráð Ísraels barna, og sendu til fongslið at fáa teir heintaðar.

22 Men tá ið embætismenninir komu, og funnu teir ikki í fongslinum, komu teir aftur, og søgdu frá,

23 Sigandi, Fongslið sanniliga funnu vit lokað við øllum tryggleika, og varðmenninar standandi uttanfyri, frammanfyri dyrnarˇ: men tá ið vit høvdu latið upp, funnu vit ongan mann innanfyri.

24 Nú, tá ið høvuðspresturin og høvuðsmaðurin av templinum og teir fremstu prestarnir hoyrdu hesi ting, ivaðust teir um tey, hvar*fram*at hetta mundi vaksa.

25 Tá kom ēin og segði teimum, sigandi, Sí, menninir, sum tit settu í fongsul, standa í templinum, og læra fólkið.

26 Tá fór høvuðsmaðurin við vaktarmonnunum, og heintaði teir uttan harðskap: tí at teir óttaðust fólkið, bara ikki teir skuldu havt verðið steinaðir.

27 Og tá ið teir vóru komnir

við teimum, settu teir *teir* framfyri ráðið: og høvuðspresturin spurdi teir,

28 Sigandi, Buðu vit ikki tykkum strangliga, at tit skuldu ikki frálæra í hesum navni? og sí, tit hava fylt Jerusalem við tykkara Guðslæru, og ætla at føra blóðið av hesum manni uppá okkum.

29 ¶ Pætur og *hīnir* ápostlarnir tá svaraðu og søgdu, Vit áttu at lýða Guð, heldur enn menn.

30 Guð fedra vára reisti upp Jesus, hvønn tit vógu og hongdu á eitt træ.

31 Hann hevur Guð upphevjað við síni høgru hond *til at vera* ein Prins og ein Frelsara, fyri at geva Ísrael umvending, og fyrigeving av syndum.

32 Og vit eru hansara vitnir um hesi ting; og *tað er* eisini Halgi Andin, hvønn Guð hevur givið til teirra sum akta hann.

33 ¶ Tá ið teir hoyrdu *tað,* vórðu teir skornir *til hjartað,* og hildu ráð *um* at vega teir.

34 Tá stóð tað upp ēin í ráðinum, ein Pharisēari, nevndur Gă-mă´-lī-ĕl, ein lærumeistari lógarinnar, hildin í umdømi millum alt fólkið, og beyð at koyra ápostlarnar út eitt lítið bil;

35 Og segði við teir, Tit menn av Ísrael, gevið gætur um tykkum sjálvar hvat tit ætla at gera viðvíkjandi hesum monnunum.

36 Tí at undan hesum døgum reis upp Thĕv´-dăs, gabbandi seg sjálvan at vera ēinhvør; til hvørs eitt tal av monnum, umleið fýra hundrað, sameinaðu seg sjálvar: hvørjir vórðu vignir; og allir, so mangir sum lýddu hann, vórðu spjaddir, og førdir til einkiðs.

37 Eftir henda mann reis upp Judas úr Galilēu í døgunum av skattingini, og dró burtur mikið fólk eftir sær: eisini hann týndist; og allir, *enntá* so mangir sum aktaðu hann, vórðu spjaddir.

38 Og nú sigi eg við tykkum, Haldið *tykkum* frá hesum monnunum, og latið teir vera: tí at um hetta ráð ella hetta verk veri av monnum, vil tað koma til einkiðs:

39 Men um tað veri av Guði, kunnu tit ikki koyra tað um koll; at ikki møguliga tit verði funnir enntá at berjast ímóti Guði.

40 Og við hann vóru teir samdir: og tá ið teir høvdu kallað ápostlarnar, og bart *teir,* buðu teir at teir skuldu ikki tala í Jesu navni, og lótu teir fara.

41 ¶ Og teir fóru avstað frá hjáveru ráðsins, fegnandi *yvir* at teir vórðu roknaðir verdigir at líða skomm fyri navn hansara.

42 Og dagligani í templinum, og í hvørjum húsi, hildu teir ikki uppat at frálæra og prædika Jesus Christ.

KAPITUL 6

OG í teimum døgum, tá ið talið á lærusveinunum varð margfaldað, reistist tað ein knarran av Grikkunum ímóti Hebrēarunum, av tí at teirra einkjur vórðu fjónaðar í tí dagligu tæningini.

2 Tá kallaðu teir tólv fjøldina av lærusveinunum *at sær,* og søgdu, Tað er ikki ráðiligt at vit skuldu farið frá Guðs orði, og tænt bordum.

3 Hvørsvegna, brøður, hyggið tit fram tykkara millum sjey menn av ærligum ummæli, fullar av Halga Andanum og vísdómi, hvørjar vit mega skipa yvir hesum starvi.

4 Men vit vilja geva okkum sjálvar áframhaldandi til bønar, og til tænastu orðsins.

5 ¶ Og framsøgnin hóvaði allari fjøldini: og teir valdu Stephan, ein mann — fullan av trúgv og av Halga Andanum, og Philippus, og Prŏch-ŏ´-rŭs, og Nī´-că-nôr, og Tī´-mŏn, og Pâr-mē´-năs, og Nicolas — ein trúskifting úr Ăntī-ŏ´-chĭ-ŭ:

6 Hvørjar teir settu framfyri

ápostlarnar: og tá teir høvdu biðið, løgdu teir *sínar* hendur á teir.
7 Og Guðs orð tók til; og talið á lærusveinunum margfaldaðist í Jerusalem stórliga; og ein stórur skari av prestunum vórðu lýdnir mót trúnni.
8 Og Stephan, fullur av trúgv og kraft, gjørdi mikil undur og kraftarverk millum fólksins.
9 ¶ Tá reistust ávísir úr teirri sýnagoguni sum verður kallað *sýnagogan* hjá Lĭ-bĕr-tīn´-unum, og Cý-rē´-nē-ingunum, og Âl-ĕx-ăndrĭ-ān´-arunum, og hjá teimum úr Çĭ-lĭ´-çĭ-ŭ og úr Asiu, í orðadrátti við Stephan.
10 Og teir vóru ikki førir fyri at standa ímóti vísdóminum og andanum, av hvørjum hann talaði.
11 Tá lokkaðu teir menn, sum søgdu, Vit hava hoyrt hann tala halgispottilig orð ímóti Mósesi, og *ímóti* Guði.
12 Og teir østu upp fólkið, og hinar elstu, og hinar skriftlærdu, og komu uppá *hann,* og fangaðu hann, og førdu *hann* til ráðið,
13 Og settu upp følsk vitnir, sum søgdu, Hesin maður gevst ikki at tala halgispottilig orð ímóti hesum heilaga plássi, og lógini:
14 Tí at vit hava hoyrt hann siga, at hesin Jesus úr Nazareth skal oyða hetta stað, og skal broyta tær venjur sum Móses fekk okkum.
15 Og allir sum sótu í ráðinum, hyggjandi støðufastligani á hann, sóu hans andlit sum hevði tað verið andlitið á einum eingli.

KAPITUL 7

TÁ segði høvuðspresturin, Eru hesi tingini so?
2 Og hann segði, Menn, brøður, og fedrar, lýðið á; Guð dýrdarinnar birtist faðir okkara Ábrahami, tá ið hann var í Mê-sô-pô-tá´-mĭ-ŭ, áðrenn hann dvaldist í Chár´-răn,
3 Og segði við hann, Slepp tær út úr landi tínum, og frá ættarfólki tínum, og kom inn í landið sum eg skal sýna tær.
4 Tá kom hann út úr landi Chăl-dē´-anna, og búði í Chár´-răn: og haðani frá, tá ið faðir hansara var deyður, flutti hann hann inn í hetta landið, í hvørjum tit nú dvøljast.
5 Og hann gav honum ongan arvalut í tí, nei, ikki *so mikið sum* til at seta fót sín á: tó fyrijáttaði hann, at hann vildi geva tað til hansara til ognar, og til sáð hansara eftir hann, tá ið *sum enn var* hann einkið barn hevði.
6 Og Guð talaði á hesa vís, At hansara sáð skuldi verða í útisetri í einum fremmandum landi; og at teir skuldu føra teir inn í trældóm, og fara illani við *teimum í* fýra hundrað ár.
7 Og tjóðina, fyri hvørji teir skulu vera í trældómi, vil eg døma, segði Guð: og eftir tað skulu teir koma fram, og tæna mær á hesum staði.
8 Og hann gav honum umskeringar-sáttmálan: og so gat *Ábraham* Ísaak, og umskar hann tann áttanda dagin; og Ísaak*ur gat* Jákob; og Jákob *gat* teir tólv ættarfedrarnar.
9 Og ættarfedrarnir, drivnir við øvund, seldu Jóseph inn í Egyptaland: men Guð var við honum,
10 Og útfríaði hann út úr øllum hansara trongslum, og gav honum góðvild og vísdóm í eygsjón Pharaohs, Egyptalands kongs; og hann gjørdi hann *til* landsstjóra yvir Egyptalandi og øllum sínum húsi.
11 Nú, tað kom ein svøltur yvir alt Egyptaland og Chā´-năn, og mikil trongsla: og okkara fedrar funnu einkið uppihald.
12 Men tá ið Jákob hoyrdi, at tað var korn í Egyptalandi, sendi hann út okkara fedrar fyrst.
13 Og við hitt annað *skifti* varð

Jóseph gjørdur kunnur fyri brøðrum sínum; og Josephs ættarfólk varð gjørt kunnugt at Pharaoh.
14 Tá sendi Jóseph, og kallaði faðir sín Jákob til *sín,* og alt ættarfólk sítt, trísinstjúgu og fimtan sálir.
15 So Jákob fór niður í Egyptaland, og doyði, hann, og fedrar várir,
16 Og vórðu bornir yvir í Sý-chěm, og lagdir í gravhýsið sum Ábraham keypti fyri peningaupphædd av sonum Ěm-môr-s, *faðir* Sý-chěm-s.
17 Men tá ið tíðin av fyrijáttanini nærkaðist, sum Guð hevði svorið til Ábrahams, vaks fólkið og margfaldaðist í Egyptalandi,
18 Til ein annar kongur reistist, sum kendi ikki Jóseph.
19 Hin sami fór sniðfundigani við ættarfólki várum, og handfór ónt várar fedrar, so at teir kastaðu út síni ungu børn, til tess endamáls *at* tey máttu ikki livað.
20 Á hvørji tíð Móses varð føddur, og var avbera fagur, og fostraður upp í húsi faðirs síns *í* tríggjar mánaðir:
21 Og tá ið hann var kastaður út, tók dóttir Pharaohs hann upp, og fostraði hann sum sín egna son.
22 Og Móses varð lærdur í øllum vísdómi Egyptanna, og var mektigur í orðum og í gerðum.
23 Og tá ið hann var full fjøruti ára gamalur, kom tað inn í hansara hjarta at vitja brøður sínar, børn Ísraels.
24 Og, síggjandi ein *teirra* líðandi órætt, vardi hann *hann,* og hevndi hann sum varð kúgaður, og sló Egyptan:
25 Tí at hann helt, *at* hansara brøður vildu havt skilt, hvussu ið Guð við hansara hond vildi útfría teir: men teir skiltu ikki.
26 Og hin næsta dagin sýndi hann seg sjálvan at teimum, sum teir trættust, og vildi havt latið teir ēinast aftur, sigandi, Harrar, tit eru brøður; hví gera tit órætt hvør ímóti øðrum?
27 Men hann, sum gjørdi næsta sínum órætt, stoytti hann burtur, sigandi, Hvør gjørdi teg *til* ein stjórnara og ein dómara yvir okkum?
28 Vilt tú drepa meg, sum tú gjørdirt *við* Egyptan í gjár?
29 Tá flýddi Móses við hesa framsøgn, og varð ein útlendingur í landi Mā-dī-ăn-s, hvar hann gat tveir synir.
30 Og tá ið fjøruti ár vóru útrunnin, birtist fyri honum í oyðu Sī-nā fjalls ein eingil Harrans í einum eldsloga í einum runni.
31 Tá ið Móses sá *tað,* undraðist hann á sjónina: og, sum hann nærkaðist at skoða *tað,* kom rødd Harrans at honum,
32 *Sigandi,* Eg *eri* Guð fedra tína, Guð Ábrahams, og Guð Ísaaks, og Guð Jákobs. Tá nøtraði Móses, og tordi ei hyggja *at.*
33 Tá segði Harrin til hansara, Tak av tínar skógvar frá tínum fótum: tí at staðið, har tú stendurt, er heilag jørð.
34 Eg havi sæð, eg havi sæð nívdina hjá mínum fólki sum er í Egyptalandi, og eg havi hoyrt teirra stynjan, og eri komin niður at útfría tey. Og nú kom, eg vil senda teg inn í Egyptaland.
35 Hendan Móses, hvønn teir vístu burtur, sigandi, Hvør gjørdi teg *til* ein stjórnara og ein dómara? tann sama sendi Guð *til at vera* ein stjórnara og ein útfríara við hendi tess eingils sum birtist fyri honum í runninum.
36 Hann førdi teir út, eftir at hann hevði sýnt undur og tekin í Egyptalandi, og í Reyðahavinum, og í oyðuni fjøruti ár.
37 ¶ Hetta er tann Móses, sum segði við børn Ísraels, Ein prophet skal Harrin Guð tykkara reisa tykkum upp av brøðrum

tykkara, mær líkan; hann skulu tit hoyra.
38 Hetta er hann, sum var í kirkjuni í oyðuni við einglinum, sum talaði til hansara á fjallinum Sĭ-nă, og *við* okkara fedrum: hvør fekk hinar lívligu oraklar at geva okkum:
39 Fyri hvørjum okkara fedrar vildu ikki lýða, men stoyttu *hann* frá sær, og í sínum hjørtum vendu tilbakar aftur inn í Egyptaland,
40 Sigandi við Aaron, Ger okkum gudar at fara undan okkum: tí at *hvat* hesum Mósesi *viðvíkur,* sum førdi okkum út úr Egyptalandi, vit vita ikki hvat er vorðið av honum.
41 Og teir gjørdu ein kálv í teimum døgum, og ofraðu skurðgudinum sláturoffur, og fegnaðust í verkum egnu handa sína.
42 Tá vendi Guð, og gav teir upp til at tilbiðja herlið himins; eins og skrivað stendur í bók prophetanna, O tit hús Ísraels, hava tit ofrað til mín vigin djór og sláturoffur˘ *yvir skeiðið á* fjøruti ár í oyðuni?
43 Ja, tit tóku upp tabernakkul Molochs, og stjørnu Rĕm-phăn-s, guds tykkara, myndir sum tit gjørdu til at tilbiðja tær: og eg vil bera tykkum burt handan Bábylon.
44 Okkara fedrar høvdu vitnisburðar-tabernaklið í oyðuni, eins og hann hevði fyriskipað, talandi við Móses, at hann skuldi gera tað samsvarandi við sniðið sum hann hevði sæð.
45 Hvørt eisini okkara fedrar, sum komu aftaná, førdu inn við Jesusi inn í ogn Heidninganna, hvørjar Guð rak út undan andliti fedra vára, at døgum Dávids;
46 Hvør fann yndi frammi fyri Guði, og tráaði at finna eitt tabernakkul til Guðs Jákobs.
47 Men Sálomon bygdi honum eitt hús.
48 Hvussu so er, hin Hægsti býr ikki í templum, gjørdum við hondum; eins og sigur propheturin,
49 Himin *er* tróna mín, og jørð mín fótskammul: hvat hús vilja tit byggja mær? sigur Harrin: ella hvat *er* pláss hvíldar mínar?
50 Hevur ikki hond mín gjørt øll hesi ting?
51 ¶ Tykkara harðsvíraðu og óumskornu í hjarta og oyrum, tit standa altíð ímóti Halga Andanum: eins og tykkara fedrar *gjørdu,* soleiðis *gera* tit.
52 Hvørjum av prophetunum hava ikki tykkara fedrar søkt at? og teir hava vigið teir sum fyrifram sýndu um komu Hins Rættvísa; av hvørjum tit hava verið nú svíkjararnir og myrðararnir:
53 Hvørjir móttikið hava lógina við medvirkan eingla, og hava ikki hildið *hana.*
54 ¶ Tá ið teir hoyrdu hesi ting, vórðu teir skornir til hjartað, og teir grísladu ímóti honum við tonnum *sínum.*
55 Men hann, verandi fullur av Halga Andanum, hugdi upp støðufastligani inn í himin, og sá dýrd Guðs, og Jesus standandi við høgru hond Guðs,
56 Og segði, Sí, eg siggi himnarnar opnaðar, og Menniskjusonin standandi við høgru hond Guðs.
57 Tá róptu teir út við harðari rødd, og stappaðu síni oyru, og runnu uppá hann við ēinum samljóði,
58 Og kastaðu *hann* út úr staðinum, og steinaðu *hann:* og vitnini løgdu síni klæðir niður við føturnar á einum ungum manni, hvørs navn var Saulus.
59 Og teir steinaðu Stephan, kallandi uppá *Guð,* og sigandi, Harri Jesus, tak við anda mínum.
60 Og hann knelaði niður, og rópti við harðari rødd, Harri, legg ikki hesa synd til teirra rokning. Og tá ið hann hetta hevði sagt, sovnaði hann.

KAPITUL 8

OG Saulus var samtykjandi at hansara deyða. Og á teirri tíð var mikil atsókn ímóti kirkjuni sum var í Jerusalem; og tey vórðu øll spjødd útumkring út gjøgnum umráðini av Judæu og Sămâr´ĭ-ŭ, uttan ápostlarnir.

2 Og Guðshugaðir menn bóru Stephan *til hansara gravlegging,* og hildu mikið harmljóð yvir honum.

3 Hvat Saulusi viðvíkur, hann framdi oyðing av kirkjuni, farandi inn í hvørt hús, og, hálandi menn og kvinnur, gav *tey* yvir til fongsul.

4 Tí fóru teir, sum vórðu spjaddir útumkring, allar staðir prædikandi orðið.

5 Tá fór Philippus oman til Să-mâr´ĭ-ŭ staðar, og prædikaði teimum Christ.

6 Og fólkið við ēinum samljóði gav gætur eftir teimum tingunum sum Philippus talaði, hoyrandi og síggjandi kraftarverkini sum hann gjørdi.

7 Tí óreinir andar, rópandi við harðari rødd, komu út úr mongum sum vóru heltikin *við teimum:* og mong, tikin við lamningum, og sum vóru lamin, vórðu grødd.

8 Og tað var mikil frøi í tí staðinum.

9 Men har var ein ávísur maður, kallaður Símun, sum frammanundan í tí sama staðinum brúkti gand, og forheksaði fólkið av Sămâr´ĭ-ŭ, setandi fram at sjálvur hann var ēinhvør mikil:

10 Eftir hvørjum tey øll góvu gætur, frá tí minsta til hin størsta, sigandi, Hesin maður er hin mikla kraft Guðs.

11 Og eftir honum tey øll góvu far, av tí at í langa tíð hevði hann forheksað tey við gandum.

12 Men tá ið tey trúðu Philippusi, prædikandi tingini viðvíkjandi kongadømi Guðs, og navni Jesu Christs, vórðu tey doypt, bæði menn og kvinnur.

13 Tá trúði Símun sjálvur eisini: og, tá ið hann var doyptur, helt hann áfram við Philippusi, og undraðist, skoðandi kraftarverkini og teknini sum vórðu gjørd.

14 Nú, tá ið ápostlarnir, sum vóru í Jerusalem, hoyrdu, at Sămâr´ĭ-â hevði tikið við orði Guðs, sendu teir til teirra Pætur og Jóhannes:

15 Hvørjir, tá ið teir vóru komnir oman, bóðu fyri teimum, at tey máttu móttaka Halga Andan:

16 (Tí sum enn *var* var hann fallin uppá ongan av teimum: einans *at* tey vóru doypt í navni Harrans Jesu.)

17 Tá løgdu teir *sínar* hendur á tey, og tey móttóku Halga Andan.

18 Og tá ið Símun sá, at gjøgnum álegging av hondunum hjá ápostlunum varð Halgi Andin givin, beyð hann teim pening,

19 Sigandi, Gevið mær eisini hesa kraft, at á hvønnsumhelst *ið* eg leggi hendur, hann má móttaka Halga Andan.

20 Men Pætur segði við hann, Peningur tín glatist við tær, av tí at tú hevurt hugsað at gáva Guðs kann verða keypt við peningi.

21 Tú hevurt hvørki part ella lut í hesi søk: tí at títt hjarta er ikki rætt í eygsjón Guðs.

22 Vend um, tessvegna, frá hesi vondsku tíni, og bið Guð, um møguliga hugsan hjarta tíns má verða fyrigivin tær.

23 Tí at eg varnist, at tú ert í galli beiskleikans, og *í* fjøtri misgerðarinnar.

24 Tá svaraði Símun, og segði, Biðjið tit til Harrans fyri mær, at einkið av hesum tingunum, sum tit hava talað, komi uppá meg.

25 Og teir, tá ið teir høvdu vitnað og prædikað orð Harrans,

vendu aftur til Jerusalem, og prædikaðu gleðiboðskapin í mongum bygdum hjá Să-măr-ĭ-tān´-arunum.

26 Og eingil Harrans talaði við Philippus, sigandi, Reis *teg,* og far ímóti suðuri at veginum sum fer oman frá Jerusalem til Gā´-zā, sum er oyðimørk.

27 Og hann reistist og fór: og sí, ein maður úr Ē-thĭ-ō´-pĭ-ŭ, ein hirðmaður av miklum myndugleika undir Kăn-dā´-cē, drotning Ē-thĭ-ō´-pĭ-aranna, hvør hevði áleggingina av øllum hennara dýrgripi, og var komin til Jerusalem fyri at tilbiðja,

28 Var áleiðis aftur, og, sitandi í vagni sínum, las Ē-sâĭ´-ās prophet.

29 Tá segði Andin við Philippus, Far nær, og halt teg afturat hesum vagni.

30 Og Philippus rann hagar til *hansara,* og hoyrdi hann lesa Ē-sâĭ´-ās prophet, og segði, Skilurt tú tað tú lesurt?

31 Og hann segði, Hvussu kann eg, uttan onkur maður skuldi vegleitt meg? Og hann tráaði Philippus, at hann vildi komið upp og sitið hjá sær.

32 Staðið av skriftini, sum hann las, var hetta, Hann varð leiddur sum ein seyður til slátringina; og líkasum eitt lamb, málleyst frammi fyri klippara sínum, svá læt hann ikki upp munn sín:

33 Í hans eyðmýking varð hansara dómur tikin burtur: og hvør skal kunngera ætt hansara? tí at hansara lív er tikið frá jørðini.

34 Og hirðmaðurin tók til orða *við* Philippus, og segði, Eg biði teg, um hvønn talar propheturin hetta? um seg sjálvan, ella um onkran annan mann?

35 Philippus tá læt upp sín munn, og byrjaði við tí sama skriftstaðnum, og prædikaði honum Jesus.

36 Og sum teir fóru á vegi *sínum,* komu teir at einum ávísum vatni: og hirðmaðurin segði, Sí, *her er* vatn; hvat forðar mær at verða doyptur?

37 Og Philippus segði, Um tú trýrt við øllum hjarta tínum, *so* kanst tú. Og hann svaraði og segði, Eg trúgvi at Jesus Christus er Sonur Guðs.

38 Og hann skipaði vagninum at standa stillur: og teir fóru niður báðir inn í vatnið, bæði Philippus og hirðmaðurin; og hann doypti hann.

39 Og tá ið teir vóru komnir upp út úr vatninum, Andi Harrans rykti burtur Philippus, at hirðmaðurin sá hann ei meira: og hann fór eftir vegi sínum fagnandi.

40 Men Philippus varð funnin í Ă-zō´-tūs: og, farandi ígjøgn, prædikaði hann í øllum staðunum, til hann kom til Çæ-sâ-rē´-ŭ.

KAPITUL 9

OG Saulus, enn froysandi út hóttanir og slátran ímóti lærusveinum Harrans, fór til høvuðsprestin,

2 Og tráaði av honum brøv til Damascus til sýnagogurnar, at um hann fann nakran, til*hoyrandi* hesum veginum, hvørt tey vóru menn ella kvinnur, hann mátti føra tey bundin til Jerusalem.

3 Og sum hann ferðaðist, kom hann nær Damascus: og brádliganí skein tað runt um hann eitt ljós frá himni:

4 Og hann fell til jarðarinnar, og hoyrdi eina rødd, sigandi við seg, Saul, Saul, hví søkirt tú at mær?

5 Og hann segði, Hvør ert tú, Harri? Og Harrin segði, Eg eri Jesus, hvørjum tú søkirt at: *tað verður* torført hjá tær at sparka ímóti broddunum.

6 Og hann, skelvandi og ovfarin, segði, Harri, hvat vilt tú hava meg at gera? Og Harrin *segði* við hann, Reis *teg,* og far

inn í staðin, og tað skal verða sagt tær hvat tú mást gera.

7 Og menninir, sum ferðaðust við honum, stóðu málleysir, hoyrandi eina rødd, men síggjandi ongan mann.

8 Og Saul reistist frá jørðini; og tá ið hans eygu vóru opnaði, sá hann ongan mann: men teir leiddu hann við hondini, og førdu *hann* inn í Damascus.

9 Og hann var tríggjar dagar uttan sjón, og hvørki át ella drakk.

10 ¶ Og tað var ein ávísur lærusveinur í Damascus, nevndur Ăn-ă-nī´-ăs; og til hansara segði Harrin í eini sjón, Ăn-ă-nī´-ăs. Og hann segði, Sí, eg *eri her,* Harri.

11 Og Harrin *segði* við hann, Reis *teg,* og far inn á gøtuna sum kallast Beina, og fregnast í húsi Judasar eftir *ēinum,* kallaður Saulus, frá Tarsus: tí sí, hann biður,

12 Og hevur sæð í eini sjón ein mann, nevndan Ăn-ă-nī´-ăs, komandi inn, og leggjandi *sína* hond á hann, at hann mátti móttaka sjón sína.

13 Tá svaraði Ăn-ă-nī´-ăs, Harri, eg havi hoyrt av mongum um henda mann, hvussu mikið ilt hann hevur gjørt ímóti tínum heilagu í Jerusalem:

14 Og her hevur hann myndugleika frá høvuðsprestunum at binda øll sum kalla á navn títt.

15 Men Harrin segði við hann, Far tín veg: tí at hann er mær eitt útvalt ílat, til at bera navn mítt framfyri Heidningarnar, og kongar, og børn Ísraels:

16 Tí at eg vil sýna honum hvussu mikil ting hann má líða fyri navns míns skuld.

17 Og Ăn-ă-nī´-ăs fór sín veg, og fór inn í húsið; og, leggjandi sínar hendur á hann, segði, Bróðir Saul, Harrin, *enntá* Jesus, sum birtist tær á veginum, sum tú komst, hevur sent meg, at tú máttirt móttaka sjón tína, og verða fyltur við Halga Andanum.

18 Og í stundini fullu tað frá hans eygum sum høvdu tað verið skøl: og hann móttók sjón við tað sama, og reistist, og varð doyptur.

19 Og tá hann hevði móttikið mat, varð hann styrktur. Tá varð Saulus ávísar dagar hjá lærusveinunum sum vóru í Damascus.

20 Og beinanvegin prædikaði hann Christ í sýnagogunum, at hann er Sonur Guðs.

21 Men allir, sum hoyrdu *hann,* vórðu ovfarnir, og søgdu; Er ikki hetta hann sum oyddi tey sum kallaðu á hetta navn í Jerusalem, og kom higar fyri tað endamál at hann mátti føra tey bundin til teir fremstu prestarnar?

22 Men Saulus øktist tess meiri í styrki, og ørkymlaði Jødarnar sum dvaldust í Damascus, prógvandi at hesin er sjálvastur Christus.

23 ¶ Og eftir at mangir dagar vóru uppfyltir, løgdu Jødarnir ráð *um* at drepa hann:

24 Men teirra liggjan á lúri varð kunn fyri Saulusi. Og teir vaktaðu portrini dag og nátt *fyri* at drepa hann.

25 Tá tóku lærusveinarnir hann um nátt*ina,* og lestu *hann* niður við múrin í eini kurv.

26 Og tá ið Saulus var komin til Jerusalem, kannaði hann at sameina seg til lærusveinarnar: men teir vóru allir ræddir fyri honum, og trúðu ikki at hann var ein lærusveinur.

27 Men Barnabas tók hann, og førdi *hann* til ápostlarnar, og klárlegði teimum hvussu hann hevði sæð Harran á veginum, og at hann hevði talað til hansara, og hvussu hann hevði prædikað djarvligani í Damascus í Jesu navni.

28 Og hann var hjá teimum, komandi inn og farandi út í Jerusalem.
29 Og hann talaði djarvligani í navni Harrans Jesu, og kjakaðist ímóti Grikkunum: men teir lógu úti eftir at vega hann.
30 *Sum,* tá ið brøðurnir vitstu, teir førdu hann oman til Cæ̆-sâ-rē´-ŭ, og sendu hann fram til Tarsus.
31 Tá høvdu kirkjurnar hvíld út gjøgnum alla Judæu og Galilēu og Să-mâr´-ĭ-ŭ, og vórðu uppbygdar; og, gangandi í ótta Harrans, og í uggan Halga Andans, vórðu margfaldaðar.
32 ¶ Og tað bar á, sum Pætur fór út gjøgnum øll *heraðshorn,* kom hann oman eisini til tey heilagu sum búðu í Lȳd´-dŭ.
33 Og har fann hann ein ávísan mann, nevndan Ǣ-nē´-ăs, sum hevði passað song sína átta ár, og var sjúkur av lamninginum.
34 Og Pætur segði við hann, Ǣ-nē´-ăs, Jesus Christus ger teg frískan: reis *teg,* og reið upp song tína. Og hann reistist alt fyri eitt.
35 Og øll, sum búðu í Lȳd´-dŭ og Sâr´-ŏn, sóu hann, og vendu til Harrans.
36 ¶ Nú, tað var í Joppe ein ávís lærusveinka, nevnd Tabitha, sum, við týðing, er kallað Dorcas: henda kvinna var full av góðum verkum og olmussugerðum sum hon gjørdi.
37 Og tað bar á í teimum døgum, at hon varð sjúk, og doyði: hvørja, tá ið tey høvdu tváað, tey løgdu *hana* í eitt ovara kamar.
38 Og við tað at Lȳd´-dă var nær við Joppe, og lærusveinarnir høvdu hoyrt at Pætur var har, sendu teir tveir menn til hansara, tráandi *hann* at hann ikki vildi drálað at koma til teirra.
39 Tá reistist Pætur og fór við teimum. Tá ið hann var komin, førdu tey hann inn í hitt ovara kamarið: og allar einkjurnar stóðu hjá honum grátandi, og sýnandi kyrtlarnar og klæðini sum Dorcas gjørdi, meðan hon var hjá teimum.
40 Men Pætur koyrdi tey øll fram, og knelaði niður, og bað; og, snarandi *sær* til líkið, segði, Tabitha, reis *teg.* Og hon læt upp eygu síni: og tá ið hon sá Pætur, settist hon upp.
41 Og hann gav henni hond *sína,* og lyfti hana upp, og tá ið hann hevði kallað tey heilagu og einkjurnar, setti hana fram livandi.
42 Og tað varð kunnugt út gjøgnum alla Joppe; og mong trúðu á Harran.
43 Og tað bar á, at hann dvaldi mangar dagar í Joppe hjá ēinum Símuni, einum garvara.

KAPITUL 10

TAÐ var ein ávísur maður í Cæ̆-sâ-rē´-ŭ, kallaður Cornelius, ein hundraðsovasti av liðinum – kallað hitt Italiska *liðið,*
2 *Ein* frómur *maður,* og ēin sum óttaðist Guð við øllum húsi sínum, sum gav nógvar olmussur til fólkið, og bað til Guðs alveg.
3 Hann sá í eini sjón týðiligani um hin níggjunda tíma dagsins ein eingil Guðs komandi inn til sín, og sigandi við seg, Cornelius.
4 Og tá ið hann hugdi á hann, varð hann ræddur, og segði, Hvat er tað, Harri? Og hann segði við hann, Bønir tínar og olmussur tínar eru komnar upp til eina áminning frammi fyri Guði.
5 Og nú, send menn til Joppe, og kalla eftir *ēinum* Símuni, hvørs tilnavn er Pætur:
6 Hann *hevur* innivist hjá ēinum Símuni, einum garvara, hvørs hús er við sævarstrondina: hann skal siga tær hvat tú eigurt at gera.
7 Og tá ið eingilin, sum talaði við Cornelius, var farin avstað,

kallaði hann tveir av sínum húshalds-tænarum, og ein fróman hermann av teimum sum vartaðu um hann støðugt;

8 Og tá ið hann hevði kunngjørt teimum øll *hesi* ting, sendi hann teir til Joppe.

9 ¶ Um morgunin, sum teir fóru á síni ferð, og nærkaðust staðinum, fór Pætur upp á takið at biðja kring hin sætta tíman:

10 Og hann gjørdist sera svangur, og vildi havt etið: men meðan tey gjørdu tilreiðar, fell hann inn í eina transu,

11 Og sá himin upplatnan, og eitt ávíst ílat dalandi at sær, sum hevði tað verið ein stórur dúkur, knýttur við tey fýra hjørnini, og sigin niður til jarðarinnar:

12 Hvarí vóru alskyns ferføtt djór˘ jarðarinnar, og villini djór˘, og skriðkykt, og fuglar luftarinnar.

13 Og tað kom ein rødd til hansara, Reis *teg*, Pætur; drep, og et.

14 Men Pætur segði, Ei so, Harri; tí at eg havi aldri etið nakað sum er algongt ella óreint.

15 Og røddin *talaði* við hann aftur aðru ferðina, Tað, *sum* Guð hevur reinsað, *tað* kalla ikki tú algongt.

16 Hetta varð gjørt trísinnis: og ílatið varð móttikið upp aftur inn í himin.

17 Nú, meðan Pætur ivaðist í sær sjálvum hvat henda sjón, sum hann hevði sæð, mundi merkja, sí, menninir, sum vóru sendir frá Corneliusi, høvdu uppspurt húsið hjá Símuni, og stóðu frammanfyri portrið,

18 Og kallaðu, og spurdu, hvørt Símun, sum varð tilnevndur Pætur, hevði innivist har.

19 ¶ Meðan Pætur hugsaði um sjónina, segði Andin við hann, Sí, tríggir menn søkja teg.

20 Reis *teg* tí, og slepp tær oman, og far við teimum, einkið ivandi: tí at eg havi sent teir.

21 Tá fór Pætur oman til menninar sum vóru sendir til hansara frá Corneliusi; og segði, Sí, eg eri hann hvønn tit søkja: hvør *er* grundin *fyri* hví tit eru komnir?

22 Og teir søgdu, Hundraðsovastin Cornelius, ein rættvísur maður, og ēin sum óttast Guð, og av góðum ummæli millum alla tjóð Jødanna, varð varslaður frá Guði við^ einum heilagum eingli *um* at senda eftir tær inn í hús sítt, og at hoyra orð˘ frá tær.

23 Tá kallaði hann teir inn, og hýsti *teimum*. Og um morgunin fór Pætur avstað við teimum, og ávísir brøður frá Joppe fylgdust við honum.

24 Og dagin eftir komu teir inn í Çæ-sâ-rē´-ŭ. Og Cornelius bíðaði eftir teimum, og hevði kallað saman sínar skyldmenn og næru vinir.

25 Og, sum Pætur kom inn, møtti Cornelius honum, og fell niður við hansara føtur, og tilbað *hann*.

26 Men Pætur tók hann upp, sigandi, Statt upp; eg sjálvur eisini eri ein maður.

27 Og sum hann talaði við hann, fór hann inn, og fann mong sum vóru saman komin.

28 Og hann segði við tey, Tit vita, hvussu ið tað er eitt ólógligt ting hjá einum manni, sum er ein Jødi, at halda samlag, ella koma til ēin av eini aðrari tjóð; men Guð hevur sýnt mær, at eg skuldi ikki kalla nakran mann algongdan ella óreinan.

29 Tí kom eg *til tykkum* uttan andmæling, so skjótt sum eg varð sendur eftir: eg spyrji tí fyri hvørja ætlan tit hava sent eftir mær?

30 Og Cornelius segði, *Fyri* fýra døgum síðani fastaði eg inntil henda tíma; og við hin níggjunda tíma bað eg í húsi mínum, og sí,

ein maður stóð frammanfyri mær í bjørtum klædnaði,
31 Og segði, Cornelius, bøn tín er hoyrd, og tínar olmussur eru havdar í endurminning í eygsjón Guðs.
32 Send tí til Joppe, og kalla higar Símun, hvørs tilnavn er Pætur; hann hevur innivist í húsinum hjá *ēinum* Símuni, einum garvara, við sævarstrondina: sum, tá ið hann kemur, skal tala fyri tær.
33 Alt fyri eitt, tessvegna, sendi eg til tín; og tú hevurt gjørt væl *í* at tú ert komin. Nú, tí eru vit øll her tilstaðar frammi fyri Guði, at hoyra øll ting sum eru boðin tær av Guði.
34 ¶ Tá opnaði Pætur munn *sín*, og segði, Av sonnum varnist eg, at Guð er eingin metari av persónum:
35 Men í hvørji tjóð hann, sum óttast hann, og virkar rættvísi, er góðtikin hjá honum.
36 Hitt orðið sum *Guð* sendi børnum Ísraels, prædikandi frið við Jesusi Christi: (hann er Harri alra:)
37 Tað orðið, *sigi eg,* kenna tit, sum varð kunngjørt út gjøgnum alla Judæu, og byrjaði frá Galilēu, eftir tann dópin sum Jóhannes prædikaði;
38 Hvussu Guð salvaði Jesus úr Nazareth við Halga Andanum og við kraft: sum[p] fór um gerandi gott, og grøðandi øll sum vóru kúgaði av djevlinum; tí at Guð var við honum.
39 Og vit eru vitnir um øll ting sum hann gjørdi bæði í landi Jødanna, og í Jerusalem; hvønn teir vógu og hongdu á eitt træ:
40 Hann reisti Guð upp hin triðja dagin, og sýndi hann opinlýsliga;
41 Ikki fyri øllum fólkinum, men vitnum, útvøld frammanundan av Guði, *enntá* fyri okkum sum ótu og drukku við honum, eftir *at* hann reis frá teimum deyðu.
42 Og hann ábjóðaði okkum at prædika fólkinum, og at vitna, at tað er hann sum varð tilskilaður av Guði *at vera* Dómarin av livandi og deyðum.
43 Til hansara geva allir prophetarnir vitnisburð, at gjøgnum navn hansara, hvørsumhelst *ið* trýr á hann, skal fáa eftirgeving av syndum.
44 ¶ Meðan Pætur enn talaði hesi orðini, fell Halgi Andin á øll tey sum hoyrdu orðið.
45 Og teir av umskeringini, sum trúðu, vórðu ovfarnir, so mangir sum komu við Pæturi, av tí at á Heidningarnar eisini varð úthelt gáva Halga Andans.
46 Tí at teir hoyrdu tey tala við tungum, og hámeta Guð. Tá tók Pætur til orða,
47 Kann nakar maður sýta vatni, at hesi skuldu ei verðið doypt, sum hava móttikið Halga Andan eins væl sum vit?
48 Og hann beyð tey at verða doypt í navni Harrans. Tá bóðu tey hann at steðga ávísar dagar.

KAPITUL 11

OG ápostlarnir og brøðurnir, sum vóru í Judæu, hoyrdu, at Heidningarnir høvdu eisini tikið ímóti orði Guðs.
2 Og tá ið Pætur var komin niðan til Jerusalem, trættu teir, sum vóru av umskeringini, við hann,
3 Sigandi, Tú fórt inn til óumskornar menn, og átst við teimum.
4 Men Pætur fór yvir *málið* frá byrjanini, og greiddi teimum frá *tí* eftir raðfylgju, sigandi,
5 Eg var í Joppe staði í bøn: og í eini transu sá eg eina sjón, Eitt ávíst ílat dala, sum hevði tað verið ein stórur dúkur, sigin niður frá himni eftir fýra hjørnum; og tað kom enntá til mín:

6 Eftir hvørjum, tá ið eg hevði fest eygu míni á tað, eg gav ans, og sá ferføtt djórˇ jarðarinnar, og villini djórˇ, og skriðkyktˇ, og fuglar luftarinnar.

7 Og eg hoyrdi eina rødd, sigandi við meg, Reis *teg,* Pætur; drep og et.

8 Men eg segði, Ei so, Harri: tí at einkið algongt ella óreint hevur á nøkrum sinni innfarið inn í munn mín.

9 Men røddin svaraði mær aftur frá himni, Tað *sum* Guð hevur reinsað, *tað* kalla ikki tú algongt.

10 Og hetta varð gjørt tríggjar ferðir: og øll vórðu drigin upp aftur inn í himin.

11 Og sí, alt fyri eitt vóru tað tríggir menn longu komnir at húsinum har eg var, sendir frá Çæ-sârĕ´-ŭ til mín.

12 Og Andin beyð mær fara við teimum, einkið ivandi. Harafturat komu hesir seks brøðurnir við mær, og vit innfóru inn í hús mansins:

13 Og hann sýndi okkum hvussu hann hevði sæð ein eingil í húsi sínum, sum stóð og segði við seg, Send menn til Joppe, og kalla eftir Símuni, hvørs tilnavn er Pætur;

14 Sum skal siga tær ordˇ, viðˆ hvørjum tú og alt hús títt skulu verða frelst.

15 Og, sum eg byrjaði at tala, fell Halgi Andin á tey, eins og á okkum at byrja við.

16 Tá mintist eg aftur orðið hjá Harranum, hvussu ið hann segði, Jóhannes víst doypti við vatni; men tit skulu verða doyptir við Halga Andanum.

17 Við tað tá at Guð gav teimum ta líku gávu sum *hann gav* okkum, sum trúðu á Harran Jesus Christ; hvat var eg, at eg kundi standa ímóti Guði?

18 Tá ið teir hoyrdu hesi tingini, hildu teir friði sínum, og dýrðmettu Guð, sigandi, So hevur Guð eisini til Heidningarnar veitt umvending til lívs.

19 ¶ Nú, teir sum vórðu spjaddir útumkring við atsóknina sum reis *upp* kring Stephan, ferðaðust so langt sum *til* Phø-nĭ´-çĭ-ŭ, og Cýpros, og Ăn-tĭ-ŏ´-chĭ-ŭ, prædikandi orðið fyri ongum uttan Jødunum einans.

20 Og summir av teimum vóru menn úr Cýpros og Cý-rĕ´-nĕ, sum, tá ið teir vóru komnir til Ăn-tĭ-ŏ´-chĭ-ŭ, talaðu fyri Grikkunum, prædikandi Harran Jesus.

21 Og hond Harrans var við teimum: og eitt mikið tal trúði, og vendi til Harrans.

22 ¶ Tá komu tíðindir um hesi ting at oyrunum á kirkjuni sum var í Jerusalem: og teir sendu fram Barnabas, at hann skuldi fara so langt sum *til* Ăn-tĭ-ŏ´-chĭ-ŭ.

23 Sum, tá ið hann kom, og hevði sæð náði Guðs, varð glaður, og formanaði teir allar, at við avráðing hjartans teir vildu halda fast at Harranum.

24 Tí at hann var ein góður maður, og fullur av Halga Andanum og av trúgv: og nógv fólk varð lagt afturat Harranum.

25 Tá fór Barnabas avstað til Tarsus, fyri at søkja Saulus:

26 Og tá ið hann hevði funnið hann, førdi hann hann til Ăn-tĭ-ŏ´-chĭ-ŭ. Og tað bar á, at eitt heilt ár savnaðu teir seg saman við kirkjuni, og lærdu væl av fólki. Og lærusveinarnir vórðu kallaðir Christnir fyrst í Ăn-tĭ-ŏ´-chĭ-ŭ.

27 ¶ Og í hesum døgum komu prophetar úr Jerusalem til Ăn-tĭ-ŏ´-chĭ-ŭ.

28 Og har stóð upp ēin av teimum, nevndur Ăg´-ă-bŭs, og uppmálaði eftir Andanum, at tað skuldi verða mikil svøltur út um allan heimin: sum hendi á døgum Claudiusar Çæsars.

29 Lærusveinarnir, hvør maður

eftir sínum førimuni, tá avráddu at senda neyðhjálp til brøðurnar sum búðu í Judæu:

30 Sum teir eisini gjørdu, og sendu tað til hinar elstu við hondum Barnabasar og Sauls.

KAPITUL 12

NÚ, um ta tíðina rætti Heródes kongur fram *sínar* hendur at plága ávís av kirkjuni.

2 Og hann drap Jákob, bróður Jóhannesar, við svørðinum.

3 Og av tí at hann sá *at* tað toknaði Jødunum, fór hann longur fram til at taka Pætur eisini. (Tá vóru dagar ósúrgaðs breyðs.)

4 Og tá ið hann hevði handtikið hann, setti hann *hann* í fongsul, og gav *hann* yvir til fýra fýramanna-vaktir av hermonnum at vakta hann; ætlandi eftir Páskir at føra hann fram til fólkið.

5 Pætur tí varð hildin í fongsli: men bøn varð gjørd uttan íhald av kirkjuni til Guðs fyri honum.

6 Og tá ið Heródes vildi havt ført hann fram, ta somu náttina svav Pætur ímillum tveir hermenn, bundin við tveimum ketum: og varðmenninir frammanfyri dyrnar vaktaðu fongslið.

7 Og sí, eingil Harrans kom uppá *hann,* og eitt ljós skein í fongslinum: og hann sló Pætur á síðuna, og reisti hann upp, sigandi, Reis *teg* upp skundisligani. Og hansara ketur fullu av frá hondum *hansara*.

8 Og eingilin segði við hann, Gyrð teg, og bint á sandalur tínar. Og hann so gjørdi. Og hann sigur við hann, Smoygg klæði títt um teg, og fylg mær.

9 Og hann fór út, og fylgdi honum; og vitsti ikki at tað var satt sum varð gjørt av einglinum; men helt hann sá eina sjón.

10 Tá ið teir vóru *farnir* framvið hini fyrstu og aðru vaktini, komu teir at jarnportrinum sum leiðir til staðarins; sum opnaðist fyri teimum av sínum egnu eintingum: og teir fóru út, og fóru áfram ígjøgnum ēina gøtu; og við tað sama fór eingilin frá honum.

11 Og tá ið Pætur var komin til sín sjálvs, segði hann, Nú veit eg við vissu, at Harrin hevur sent eingil sín, og hevur útfríað meg út úr hond Heródesar, og *frá* allari eftirvæntan Jødanna.

12 Og tá ið hann hevði umhugsað *henda lut,* kom hann til húsar Mariu, móður Jóhannesar, hvørs tilnavn var Markus; har mong vóru savnaði saman biðjandi.

13 Og, sum Pætur bankaði á dyrnar av portrinum, kom ein genta at gáa *hvør tað var,* nevnd Rhoda.

14 Og tá ið hon kendi røddina á Pæturi, opnaði hon ikki portrið vegna gleði, men rann inn, og segði frá hvussu ið Pætur stóð frammanfyri portrið.

15 Og tey søgdu við hana, Tú ert óð. Men hon støðugliga váttaði, at tað var enntá soleiðis. Tá søgdu tey, Tað er eingil hansara.

16 Men Pætur helt áfram at banka: og tá ið tey høvdu latið upp *dyrnar,* og sóu hann, vórðu tey ovfarin.

17 Men hann, gerandi tekin til teirra við hondini at halda friði sínum, upplýsti teimum hvussu Harrin hevði ført hann út úr fongslinum. Og hann segði, Farið *og* sýnið Jákobi hesi ting, og fyri brøðrunum. Og hann fór avstað, og fór inn í eitt annað pláss.

18 Nú, so skjótt sum tað var dagur, varð tað eingin smávegis røringur millum hermenninar, hvat vorðið var av Pæturi.

19 Og tá ið Heródes hevði søkt eftir honum, og fann hann ikki, rannsakaði hann varðmenninar, og beyð at *teir* skuldu verða tiknir av lívi. Og hann fór oman frá Judæu til Çæ-sâ-rē´-ŭ, og varð *har.*

20 ¶ Og Heródes var ógvuliga misnøgdur við teir úr Týrus og Sĭ´-dŏn: men teir komu við ēinum samljóði til hansara, og, havandi gjørt Blăs´-tŭs, kamarharra kongs, *til* vin sín, bóðu *um* frið; av tí at teirra land varð nørt av *landi* kongsins.

21 Og Heródes uppá ein ásettan dag, skrýddur í kongligt skrúð, settist uppá sítt hásæti, og helt eina røðu at teimum.

22 Og fólkið gav eitt róp, *sigandi, Tað er* røddin á einum gudi, og ikki á einum manni.

23 Og í stundini sló eingil Harrans hann, av tí at hann gav ikki Guði æruna: og hann varð etin av ormum, og gav upp andan.

24 ¶ Men Guðs orð vaks og margfaldaðist.

25 Og Barnabas og Saulus komu aftur frá Jerusalem, tá ið teir høvdu uppfylt *sína* tænastu, og tóku við sær Jóhannes, hvørs tilnavn var Markus.

KAPITUL 13

NÚ, tað vóru í kirkjuni, sum var í Ăn-tĭ-ō´-chĭ-ŭ, ávísir prophetar og frálærarar; eins og Barnabas, og Símeon sum varð kallaður Nī´-gĕr, og Lū´-çĭ-ŭs frá Cý-rē´-nē, og Măn´-â-ĕn, sum hevði verið uppaldur við Heródesi fjórðingsfúrsta, og Saulus.

2 Sum teir tæntu til Harrans, og fastaðu, segði Halgi Andin, Atskiljið mær Barnabas og Saulus til tað verk, at hvørjum eg havi kallað teir.

3 Og tá ið teir høvdu fastað og bíðið, og lagt *sínar* hendur á teir, sendu teir *teir* avstað.

4 ¶ So teir, verðandi sendir út av Halga Andanum, fóru avstað til Sĕ-lĕv´-cĭ-ŭ; og haðani frá sigldu teir til Cýpros.

5 Og tá ið teir vóru í Săl´-ă-mĭs, prædikaðu teir Guðs orð í sýnagogunum hjá Jødunum: og teir høvdu eisini Jóhannes til tænara *sín*.

6 Og tá ið teir vóru farnir gjøgnum oynna til Pā´-phŏs, funnu teir ein ávísan gandakall, ein falskan prophet, ein Jøda, hvørs navn *var* Bâr-jē´-sŭs:

7 Sum var hjá fulltrúa landsins, Sĕr´-gĭ-ŭs-i Paulusi, einum skilamanni; sum kallaði á Barnabas og Saul, og tráaði at hoyra Guðs orð.

8 Men gandakallurin Ē´-lў-măs, (tí at soleiðis er navn hansara við týðing,) stóð ímóti teimum, roynandi at snúgva burtur landsstjóranum frá trúnni.

9 Saulus, (sum eisini *er kallaður* Paulus,) fyltur við Halga Andanum, tá setti eygu síni á hann,

10 Og segði, O fullur av allari sniðfundni og allari ógerð, *títt* djevulsins barn, *tín* fíggindi av allari rættvísi, vilt tú ikki gevast at avskepla røttu vegir Harrans?

11 Og nú, sí, hond Harrans *er* uppiá tær, og tú skalt vera blindur, ei síggjandi sólina í eitt skeið. Og alt fyri eitt fell tað á hann eitt tám og eitt myrkur; og hann fór umkring, søkjandi onkran at leiða seg við hondini.

12 Fulltrúin, tá ið hann sá hvat gjørt var, tá trúði, verandi ovfarin yvir Guðslæru Harrans.

13 Nú, tá ið Paulus og hansara samlag loystu frá Pā´-phŏs, komu teir til Pĕr´-gŭ í Păm-phў´-lĭ-ŭ: og Jóhannes, farandi avstað frá teimum, vendi aftur til Jerusalem.

14 ¶ Men tá ið teir fóru avstað úr Pĕr´-gŭ, komu teir til Ăn-tĭ-ō´-chĭ-ŭ í Pĭ-sĭ´-dĭ-ŭ, og fóru inn í sýnagoguna á sabbatsdeginum, og settust niður.

15 Og eftir lesingina av lógini og prophetunum sendu stjórnararnir av sýnagoguni til teirra, sigandi, *Tit* menn *og* brøður, um tit havi nakað formaningar-orð til fólkið, mælið áfram.

16 Tá stóð Paulus upp, og, gerandi tekin við *síni* hond, segði, Menn av Ísrael, og tit sum óttast Guð, gevið áhoyrn.
17 Guð hjá hesum Ísraels fólki valdi okkara fedrar, og upphevjaði fólkið, tá ið teir búðu sum fremmandir í Egyptalandi, og við einum høgum armi førdi hann teir út úr tí.
18 Og umleið tíðina á fjøruti ár útstóð hann teirra atburðir í oyðuni.
19 Og tá ið hann hevði oytt sjey tjóðir í landi Chā´-nā-ăn-s, deildi hann teirra land til teir eftir luti.
20 Og eftir tað gav hann *teim* dómarar umleið skeiðið á fýra hundrað og fimti ár, inntil prophetin Sámuel.
21 Og síðan tráaðu teir ein kong: og Guð gav innat teimum Saul, son Cis, ein mann av ætt Benjamins, yvir fjøruti ára bil.
22 Og tá ið hann hevði burtflutt hann, reisti hann teimum upp Dávid til at vera kong teirra; til hvørs eisini hann gav vitnisburð, og segði, Eg havi funnið Dávid, *son* Ísais, ein mann eftir mínum egna hjarta, sum skal uppfylla allan mín vilja.
23 Av sáði hesa mans hevur Guð samsvarandi við *sína* fyrijáttan reist Ísrael ein Frelsara, Jesus:
24 Tá ið Jóhannes fyrst hevði prædikað áðrenn hansara komu umvendingardópin fyri øllum fólki Ísraels.
25 Og sum Jóhannes uppfylti skeið sítt, segði hann, Hvør halda tit at eg eri? Eg eri ikki *hann*. Men sí, tað kemur ēin eftir meg, hvørs skógvar á *hansara* fótum eg eri ikki verdur at loysa.
26 Menn *og* brøður, børn Ábrahams stammu, og hvørsumhelst tykkara millum *ið* óttast Guð, til tykkum er orðið av hesi frelsu sent.
27 Tí at teir sum dvøljast í Jerusalem, og teirra stjórnarar, av tí at teir kendu hann ikki, ella tá røddir prophetanna, sum verða lisnar hvønn sabbatsdag, hava teir uppfylt *tær* í *at* fordøma *hann*.
28 Og tó *at* teir funnu onga grund til deyða *í honum,* tó tráaðu teir Pilatus, at hann skuldi verða vigin.
29 Og tá ið teir høvdu uppfylt alt sum stóð skrivað um hann, tóku teir *hann* niður frá træinum, og løgdu *hann* í eitt gravhýsi.
30 Men Guð reisti hann frá teimum deyðu:
31 Og hann varð sæddur mangar dagar av teimum sum komu niðan við honum frá Galilēu til Jerusalem, sum eru hansara vitnir fyri fólkinum.
32 Og vit kunngera tykkum glað tíðindir, hvussu ið fyrijáttanin, sum varð gjørd fedrunum,
33 Guð hevur uppfylt okkum, teirra børnum, ta somu, í at hann hevur reist upp Jesus aftur; sum tað eisini er skrivað í øðrum psálminum, Tú ert Sonur mín, henda dag havi eg gitið teg.
34 Og hvat viðvíkur *tí,* at hann reisti hann upp frá hinum deyðu, *nú* ei meira at venda aftur til rot, segði hann á hesa vís, Eg vil geva tær hinar vissu miskunnir Dávids.
35 Hvørsvegna hann sigur eisini í einum øðrum *psálmi,* Tú skalt ikki loyva Hinum Heilaga tínum at síggja rot.
36 Tí at Dávid, eftir *at* hann hevði tænt sínum egna ættarliði við vilja Guðs, fell í svøvn, og varð lagdur at fedrum sínum, og sá rot:
37 Men hann, sum Guð reisti aftur, sá einkið rot.
38 ¶ Veri tað kunnugt tykkum, tessvegna, menn *og* brøður, at gjøgnum henda mann verður tykkum prædikað fyrigeving syndanna:
39 Og við honum allir, sum trúgva, eru rættvísgjørdir frá øllum tingum, frá hvørjum tit

kundu ikki verða rættvísgjørdir við Móselógini.
40 Verið varnir tessvegna, at ikki tað komi uppá tykkum, sum er talað um í prophetunum;
41 Síggið, tit vanvirðarar, og undrist, og týnist: tí at eg virki eitt verk í tykkara døgum, eitt verk sum tit skulu á ongan vís trúgva, tó *at* ein maður kunngeri tykkum tað.
42 Og tá ið Jødarnir vóru farnir út úr sýnagoguni, bønaðu Heidningarnir, at hesi orð máttu verða prædikað fyri teimum næsta sabbatin.
43 Nú, tá ið samkoman var loyst upp, fylgdu mangir av Jødunum og *teimum* trúrøknu prosilýttunum Paulusi og Barnabasi: hvørjir, talandi til teirra, sannførdu teir at halda áfram í náði Guðs.
44 ¶ Og næsta sabbatsdagin kom næstan allur staðurin saman at hoyra Guðs orð.
45 Men tá ið Jødarnir sóu mannfjøldirnar, vórðu teir fyltir við øvund, og talaðu ímóti teimum tingunum sum vórðu talaði av Paulusi, andmælandi og Guðsspottandi.
46 Tá vuksu Paulus og Barnabas djarvir, og søgdu, Tað var neyðugt, at Guðs orð skuldi fyrst hava verðið talað til tykkara: men eftir sum tit koyra tað frá tykkum, og døma tykkum sjálvar óverdigar til ævigtvarandi lívs, sí, vit venda *okkum* til Heidningarnar.
47 Tí at svá hevur Harrin boðið okkum, *sigandi,* Eg havi sett teg til at vera eitt ljós hjá Heidningunum, at tú skuldirt vera til frelsu at endum jarðarinnar.
48 Og tá ið Heidningarnir hoyrdu hetta, vórðu teir glaðir, og dýrðmettu Harrans orð: og so mangir, sum vóru útnevndir til ævigt lív, trúðu.
49 Og Harrans orð varð kunngjørt út gjøgnum alt umráðið.
50 Men Jødarnir østu upp hinar frómu og ærumiklu kvinnurnar, og hinar fremstu menn staðarins, og reistu atsókn ímóti Paulusi og Barnabasi, og róku teir út úr breddum sínum.
51 Men teir ristu av dust fóta sína ímóti teimum, og komu inn í Ikonium.
52 Og lærusveinarnir vórðu fyltir við gleði, og við Halga Andanum.

KAPITUL 14

OG tað bar á í Ikonium, at teir fóru báðir saman inn í sýnagoguna hjá Jødunum, og svá talaðu, at ein mikil fjøld, bæði av Jødunum og eisini av Grikkunum, trúðu.
2 Men teir vantrúgvandi Jødarnir østu upp Heidningarnar, og gjørdu teirra hugar ilt tráaðar ímóti brøðrunum.
3 Langa tíð, tessvegna, vórðu teir *verandi,* talandi djarvligani í Harranum, sum gav orði náðar sínar vitnisburð, og veitti tekin og undur at verða gjørd við teirra hondum.
4 Men mannfjøldin av staðinum var sundurdeild: og partur helt við Jødunum, og partur helt við ápostlunum.
5 Og tá ið tað varð eitt árend gjørt bæði av Heidningunum, og eisini av Jødunum við teirra stjórnarum, at brúka *teir* vanvirðisliga, og at steina teir,
6 Vórðu teir varir við *tað,* og flýddu til Lýstru og Derbe, staðir av Lýkaónii, og at økinum sum liggur runt um:
7 Og har prædikaðu teir gleðiboðskapin.
8 ¶ Og tað sat ein ávísur maður í Lýstru, máttleysur í fótum sínum, verandi krypil frá móðurlívi móður sínar, sum aldri hevði gingið:
9 Hin sami hoyrdi Paulus

tala: hvør, støðufastliga skoðandi hann, og varnandi, at hann hevði trúgv til at verða grøddur,

10 Segði við eini harðari rødd, Statt upprættur á føtur tínar. Og hann sprakk og gekk.

11 Og tá ið fólkið sá hvat Paulus hevði gjørt, hevjaðu tey upp røddum sínum, sigandi á máli Lý-că-ō´-nĭ-ŭ, Til okkara eru komnir niður gudarnir í mannalíki.

12 Og teir kallaðu Barnabas Jupiter; og Paulus Mĕr-cŭ´-rĭ-ŭs, av tí at hann var høvuðs røðumaðurin.

13 Presturin av Jupiter, sum var frammanfyri staðinum, kom tá við oksum og kransum at portrunum, og vildi havt gjørt sláturoffur við fólkinum.

14 *Hvørt,* tá ið ápostlarnir, Barnabas og Paulus, hoyrdu *um,* teir skræddu klæðir síni, og runnu inn millum fólksins, rópandi út,

15 Og sigandi, Harrar, hví gera tit hesi ting? Vit eisini eru menn av líkum sinnisrørslum við tykkum, og prædika tykkum, at tit skuldu venda frá hesum fáfongdum at hinum livandi Guði, sum gjørdi himin, og jørð, og sjógvin, og øll ting sum eru harí:

16 Sum í lidnum tíðum loyvdi øllum tjóðum at ganga í teirra egnu vegum.

17 Hóast hetta, hann eftirlæt ikki seg sjálvan uttan vitnisburð, í at hann gjørdi gott, og gav okkum regn frá himni, og fruktagóðar tíðir, fyllandi okkara hjørtu við mati og gleði.

18 Og við hesum framsagnum treyðugt hildu teir fólkinum aftur, at tey høvdu ikki gjørt sláturoffur at teimum.

19 ¶ Og tað komu hagar *ávísir* Jødar úr Ăn-tĭ-ō´-chĭ-ŭ og Ĭ-cō´-nĭ-ŭm, sum yvirtalaðu fólkið, og, havandi steinað Paulus, drógu *hann* út úr staðinum, haldandi *at* hann hevði verið deyður.

20 Hvussu enn er, sum lærusveinarnir stóðu runt um hann, reistist hann upp, og kom inn í staðin: og næsta dagin fór hann avstað við Barnabasi til Dĕr´-bē.

21 Og tá ið teir høvdu prædikað gleðiboðskapin fyri tí staðinum, og høvdu lært mangar, vendu teir aftur til Lýs´-trŭ, og *til* Ĭ-cō´-nĭ-ŭm, og Ăn-tĭ-ō´-chĭ-ŭ,

22 Støðufestandi sálirnar hjá lærusveinunum, *og* formanandi teir at halda áfram í trúnni, og at vit mugu gjøgnum mikla trongslu ganga inn í kongadømi Guðs.

23 Og tá ið teir høvdu innsett teimum elstar í hvørji kirkju, og høvdu biðið við føstu, litu teir teir upp til Harran, á hvønn teir trúðu.

24 Og eftir *at* teir høvdu farið út gjøgnum Pĭ-sĭ´-dĭ-ŭ, komu teir til Păm-phý´-lĭ-ŭ.

25 Og tá ið teir høvdu prædikað orðið í Pĕr´-gŭ, fóru teir oman til Ăt-tă´-lĭ-ŭ:

26 Og haðani sigldu til Ăn-tĭ-ō´-chĭ-ŭ, hvaðani frá teir høvdu verðið litnir upp til náðar Guðs, til tað verk sum teir uppfyltu.

27 Og tá ið teir vóru komnir, og høvdu savnað kirkjuna saman, fóru teir yvir aftur alt sum Guð hevði gjørt við teimum, og hvussu hann hevði opnað Heidningunum trúardyrnar.

28 Og har vórðu teir *í* langa tíð hjá lærusveinunum.

KAPITUL 15

OG ávísir menn, sum komu oman frá Judæu, lærdu brøðurnar, *og søgdu,* Uttan tit verði umskornir eftir háttarlagi Mósesar, kunnu tit ei verða frelstir.

2 Tá ið tí Paulus og Barnabas høvdu onga smávegis ósemju og orðadrátt við teir, gjørdu teir av, at Paulus og Barnabas, og ávísir aðrir av teimum, skuldu fara niðan til Jerusalem til ápostlanna og *hinna* elstu um henda spurning.

3 Og, verandi fördir ávegis av kirkjuni, fóru teir gjøgnum Phøní-çí-ŭ og Să-mâr-í-ŭ, kunngerandi umvending Heidninganna: og teir elvdu øllum brøðrunum mikla frøi.

4 Og tá ið teir vóru komnir til Jerusalem, vórðu teir móttiknir av kirkjuni, og *av* ápostlunum og *teimum* elstu, og teir kunngjørdu øll ting sum Guð hevði gjørt við teimum.

5 Men tað risu upp ávísir av sekt Pharisēaranna, sum trúðu, sigandi, At tað var neyðturviligt at umskera teir, og at bjóða *teimum* at halda Móselógina.

6 ¶ Og ápostlarnir og *teir* elstu komu saman fyri at umhugsa hetta mál.

7 Og tá ið har hevði verið nógvur orðadráttur, reis Pætur upp, og segði við teir, Menn *og* brøður, tit vita hvussu ið fyri góðari stund síðani, Guð gjørdi kjósan okkara millum, at Heidningarnir við munni mínum skuldu hoyra orð gleðiboðskaparins, og trúgva.

8 Og Guð, sum kennir hjørtuni, bar teim vitnisburð, gevandi teimum Halga Andan, enntá eins og *hann gav* okkum;

9 Og setti ongan mun ímillum okkum og teir, reinsandi hjørtu teirra við trúgv.

10 Nú tessvegna, hví freista tit Guð, at leggja eitt ok uppá nakkan á lærusveinunum, sum hvørki okkara fedrar ella vit vóru mentir at bera?

11 Men vit trúgva, at gjøgnum náði Harrans Jesu Christs skulu vit vera frelstir, enntá eins og teir.

12 ¶ Tá helt øll mannfjøldin tøgn, og gav áhoyrn fyri Barnabasi og Paulusi, upplýsandi hvørji kraftarverk og undur Guð hevði virkað millum Heidninganna við teimum.

13 ¶ Og eftir *at* teir høvdu hildið friði sínum, tók Jákob til orða, sigandi, Menn *og* brøður, lýðið á meg:

14 Símeon hevur kunngjørt, hvussu Guð í fyrstani vitjaði Heidningarnar, at taka úr teimum eitt fólk til navns síns.

15 Og við hetta einast orð prophetanna; sum skrivað stendur,

16 Eftir hetta vil eg venda aftur, og vil byggja aftur tabernakkul Dávids, sum er fallið niður; og eg vil byggja aftur toftir tess, og eg vil seta tað upp:

17 At hinir eftirverandi av monnum mega søkja eftir Harranum, og allir Heidningarnir, uppiá hvørjum navn mítt er kallað, sigur Harrin, sum allar hesar lutir ger.

18 Guði kunn eru øll hansara verk frá byrjan veraldarinnar.

19 Hvørsvegna dómur mín er, at vit órógvi ikki teir sum burtúr Heidningunum eru vendir til Guðs:

20 Men at vit skrivi teimum, at teir haldi sær frá óreinskanum av skurðgudum, og *frá* siðloysi, og *frá* lutum kvaldum, og *frá* blóði.

21 Tí at Móses frá gamlari tíð hevur í hvørjum staði teir sum prædika hann, verðandi lisin í sýnagogunum hvønn sabbatsdag.

22 Tá hóvaði tað ápostlunum og *hinum* elstu, við allari kirkjuni, at senda útvaldar menn úr teirra egna samlagi til Ăn-tĭ-ŏ-chĭ-ŭ við Paulusi og Barnabasi; *nevniliga,* Judas, tilnevndur Bâr-să-băs; og Silas; fremstir menn millum brøðurnar:

23 Og teir skrivaðu *brøv* við teimum eftir hesum háttarlagi; Ápostlarnir og teir elstu og brøðurnir *senda* kvøðu til brøðurnar sum eru av Heidningunum í Ăn-tĭ-ŏ-chĭ-ŭ og Sýriu og Çí-lĭ-çí-ŭ:

24 Við tað at vit hava hoyrt at ávísir, sum fóru út frá okkum, hava órógvað tykkum við orðum, veltandi um koll tykkara sálir,

sigandi, *Tit mugu* verða umskornir, og halda lógina: til hvørja vit góvu einkið *slíkt* boð:
25 Tóktist tað okkum gott, verandi savnaðir við ēinum samljóði, at senda útvaldar menn til tykkara við okkara háttelskaðu Barnabasi og Paulusi,
26 Menn, sum hava sett síni lív í vanda fyri navn várs Harra Jesu Christs.
27 Vit hava sent, tessvegna, Judas og Silas, sum skulu eisini siga *tykkum* hinar somu lutir munnliga.
28 Tí at tað tóktist gott fyri Halga Andanum, og fyri okkum, at leggja uppá tykkum onga størri byrði enn hesi neyðugu ting;
29 At tit haldi tykkum frá matum — ofraðum skurðgudum, og frá blóði, og frá lutum kvaldum, og frá siðloysi: frá hvørjum, um tit haldi tykkum sjálvar, tykkum skal gangast væl. Farið tit væl.
30 So tá ið teir vóru latnir fara, komu teir til Ăn-tĭ-ŏ´-chĭ-ŭ: og tá ið teir høvdu savnað mannfjøldina saman, avhendu teir epistilin:
31 *Hvønn,* tá ið teir høvdu lisið, teir fegnaðust fyri troystanina.
32 Og Judas og Silas, verandi prophetar eisini sjálvir, formanaðu brøðurnar við mongum orðum, og støðufestu *teir.*
33 Og eftir *at* teir høvdu dvølt *har* eitt bil, vórðu teir latnir fara í friði frá brøðrunum til ápostlarnar.
34 Hóast hetta, tað hóvaði Silasi at verða har enn.
35 Paulus eisini og Barnabas hildu áfram í Ăn-tĭ-ŏ´-chĭ-ŭ, frálærandi og prædikandi orð Harrans, við mongum øðrum eisini.
36 ¶ Og nakrar dagar eftir segði Paulus við Barnabas, Latum okkum fara aftur og vitja okkara brøður í hvørjum staði, har vit hava prædikað orð Harrans, *og siggja* hvussu teimum gongst.
37 Og Barnabas avráddi at taka við teimum Jóhannes, hvørs tilnavn var Markus.
38 Men Paulus helt ikki gott at taka hann við teimum, sum fór burtur frá teimum frá Pām-phý´-lĭ-ŭ, og fór ikki við teimum til verkið.
39 Og orðastríðið varð so hvast ímillum teir, at teir fóru avstað sundur hvør frá øðrum: og so Barnabas tók Markus, og sigldi til Cýpros;
40 Og Paulus valdi Silas, og fór avstað, verðandi litin upp av brøðrunum til náðar Guðs.
41 Og hann fór gjøgnum Sýriu og Çĭ-lĭ´-çĭ-ŭ, støðufestandi kirkjurnar.

KAPITUL 16

TÁ kom hann til Dĕr´-bê og Lýs´-trŭ: og sí, ein ávísur lærusveinur var har, nevndur Timotheus, sonur eina ávísa kvinnu sum var ein Jødinna, og trúði; men faðir hansara *var* Grikki:
2 Sum var væl fráboðaður um av brøðrunum sum vóru í Lýs´-trŭ og Ī-cō´-nĭ-ŭm.
3 Hann vildi Paulus hava at fara út við sær; og tók og umskar hann vegna Jødarnar, sum vóru í teimum umráðunum: tí at teir vitstu allir, at faðir hansara var Grikki.
4 Og sum teir fóru ígjøgnum staðirnar, avhendu teir teimum tær fyriskipanirnar fyri at halda, sum vórðu fyriskipaðar av ápostlunum og teimum elstu sum vóru í Jerusalem.
5 Og soleiðis vórðu kirkjurnar grundfestar í trúnni, og øktust í tali dagliga.
6 Nú, tá ið teir høvdu farið út gjøgnum Phrý´-gĭ-ŭ og Galatiumráðið og vórðu noktaðir av Halga Andanum at prædika orðið í Asiu,
7 Eftir *at* teir vóru komnir til

Mý´-sĭ-ŭ, kannaðu teir at fara inn
í Bĭ-thý´-nĭ-ŭ: men Andin loyvdi
teim ikki.
8 Og, farandi framvið Mý´-sĭ-ŭ,
komu teir oman til Trō´-ăs.
9 Og ein sjón birtist fyri Pau-
lusi um náttina; Har stóð ein
maður úr Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ, og bað
hann, sigandi, Kom yvir í Măc-ĕ-
dō´-nĭ-ŭ, og hjálp okkum.
10 Og eftir *at* hann hevði sæð
sjónina, alt fyri eitt royndu vit at
fara inn í Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ, vissuliga
fangandi, at Harrin hevði kallað
okkum fyri at prædika teimum
gleðiboðskapin.
11 Tessvegna, loysandi frá Trō´-
ăs, komu vit við beinari kós til
Săm-ō-thrā´-çĭ-ŭ, og næsta *dag*in
til Nĕ-ă´-pō-lĭs;
12 Og haðani frá til Philippī,
sum er hin fremsti staðurin av tí
partinum av Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ, *og* ein
niðursetustaður: og vit vóru í tí
staðinum, dvøljandi ávísar dagar.
13 Og á sabbatinum fóru vit
út úr staðinum framvið einum
áarbakka, har bøn var vant at
verða gjørd; og vit settust niður,
og talaðu við kvinnurnar sum
leitaðu *hagar*.
14 ¶ Og ein ávís kvinna, nevnd
Lýdia, ein seljari av purpuri, úr
staðinum Thý-ă-tí´-rŭ, sum tilbað
Guð, hoyrdi *okkum:* hvørs hjarta
Harrin opnaði, at hon gav gætur
at teim tingunum sum vórðu tal-
aði av Paulusi.
15 Og tá ið hon var doypt, og
húski hennara, bønaði hon *okk-
um,* sigandi, Um tit havi dømt meg
at vera trúfasta móti Harranum,
komið inn í hús mítt, og verðið
har. Og hon noyddi okkum.
16 ¶ Og tað bar á, sum vit fóru
til bønar, ein ávís genta, heltikin
við einum spásagnaranda, møtti
okkum, sum veitti sínum meistar-
um miklan vinning viðˆ spásøgn:
17 Hin sama fylgdi Paulusi og
okkum, og rópti, sigandi, Hesir
menn eru tænarar hins hægsta
Guðs, sum sýna okkum frelsu-
vegin.
18 Og hetta gjørdi hon mangar
dagar. Men Paulus, verandi nívd-
ur, vendi *sær* og segði til andan,
Eg skipi tær í navni Jesu Christs
at koma út úr henni. Og hann
kom út hina somu stund.
19 ¶ Og tá ið hennara meistarar
sóu, at vónin um teirra vinningar
var farin, fangaðu teir Paulus og
Silas, og drógu *teir* inn á torgið til
stjórnararnar,
20 Og førdu teir til høvuðs-
menninar, sigandi, Hesir menn,
verandi Jødar, ovurhondsliga ó-
rógva stað váran,
21 Og frálæra venjur, sum eru
ikki lógligar hjá okkum at taka
ímóti, eiheldur at halda, verandi
Rómverjar.
22 Og mannfjøldin reis upp
saman ímóti teimum: og høvuðs-
menninir skræddu av síni klæðir,
og buðu at berja *teir*.
23 Og tá ið teir høvdu lagt
mangar fleingjur uppá teir, kast-
aðu teir *teir* inn í fongsul, áleggj-
andi fangavørðinum at varða teir
tryggiliga:
24 Hvør, havandi móttikið slíka
álegging, stoytti teir inn í hitt inn-
ara fongslið, og gjørdi teirra føtur
fastar í stokkunum.
25 ¶ Og á midnátt bóðu Paulus
og Silas, og sungu lovprísingar at
Guði: og fangarnir hoyrdu teir.
26 Og brádliga varð tað ein
mikil jarðskjálvti, so at grundvøll-
irnir av fongslinum vórðu skak-
aðir: og alt fyri eitt vórðu allar
dyrnar opnaðar, og hvørs *og* ēins
bond vórðu loyst.
27 Og fongsulsvørðurin, vakn-
andi úr sínum svøvni, og síggj-
andi fongsulsdyrnar opnar, dró
hann út svørð sítt, og vildi havt
dripið seg sjálvan, haldandi at
fangarnir høvdu verið flýddir.
28 Men Paulus rópti við harð-

ari rødd, sigandi, Ger tær sjálvum einkið mein: tí at vit eru her allir.
29 Tá kallaði hann eftir einum ljósi, og sprakk inn, og kom skelvandi, og fell niður fyri Paulusi og Silasi,
30 Og førdi teir út, og segði, Harrar, hvat má eg gera *fyri* at verða frelstur?
31 Og teir søgdu, Trúgv á Harran Jesus Christ, og tú skalt vera frelstur, og hús títt.
32 Og teir talaðu honum orð Harrans, og til alra sum vóru í húsi hansara.
33 Og hann tók teir tann sama náttartíman, og tvó *teirra* fleingjur; og varð doyptur, hann og øll hansara, beinanvegin.
34 Og tá ið hann hevði ført teir inn í hús sítt, setti hann mat frammanfyri teimum, og fegnaðist, trúgvandi á Guð við øllum húsi sínum.
35 Og tá ið tað varð dagur, sendu høvuðsmenninir embætismenninar, sigandi, Latið hasar menninar fara.
36 Og fongsulsvørðurin taldi hesa framsøgn fyri Paulusi, Høvuðsmenninir hava sent til *tess* at lata tykkum fara: nú tessvegna, haldið avstað, og farið í friði.
37 Men Paulus segði við teir, Teir hava bart okkum opinlýsliga, ódómfeldar, verandi Rómverjar, og hava kastað *okkum* inn í fongsul; og nú stoyta teir okkum út loyniliga? nei sanniliga; men lat teir sjálvar koma og heinta okkum út.
38 Og embætismenninir søgdu høvuðsmonnunum hesi orð: og teir óttaðust, tá ið teir hoyrdu at teir vóru Rómverjar.
39 Og teir komu og bønaðu teir, og førdu *teir* út, og tráaðu *teir* at fara avstað út úr staðinum.
40 Og teir fóru út úr fongslinum, og fóru inn í *hús* Lýdiu: og tá ið teir høvdu sæð brøðurnar, uggaðu teir teir, og fóru avstað.

KAPITUL 17

NÚ, tá ið teir høvdu farið ígjøgnum Ăm-phĭ-pō´-lĭs og Ăp-ŏl-lō´-nĭ-ŭ, komu teir til Thĕss-ă-lō´-nĭ-cŭ, hvar var ein sýnagoga hjá Jødunum:
2 Og Paulus, sum hansara háttarlag var, fór inn til teirra, og tríggjar sabbatsdagar skifti orð við teir út frá skriftunum,
3 Upplatandi og hevdandi, at Christus mátti neyðugt hava liðið, og rísa aftur frá teimum deyðu; og at hesin Jesus, hvønn eg prædiki tykkum, er Christus.
4 Og summir av teimum trúðu, og gingu til fylgdar við Paulus og Silas; og av hinum frómu Grikkum ein mikil fjøld, og av hinum fremstu kvinnum ei fáar.
5 ¶ Men teir Jødarnir sum trúðu ikki, drivnir við øvund, tóku til sín ávísar ósømiligar felagar, av tí lægra slagnum, og savnaðu eitt samlag, og settu allan staðin í eitt uppstig, og lupu á húsið hjá Jā´-sŏn-i, og søktu at føra teir út til fólkið.
6 Og tá ið teir funnu teir ikki, drógu teir Jā´-sŏn og ávísar brøður at stjórnarum staðarins, rópandi, Hesir, sum hava vent øllum heiminum upp og niður, eru komnir higar eisini;
7 Hvørjum Jā´-sŏn hevur tikið ímóti: og hesir gera allir mótsatt við løgskipanir Çæsars, sigandi, at tað er ein annar kongur, *ēin* Jesus.
8 Og teir órógvaðu fólkið og stjórnarar staðarins, tá ið teir hoyrdu hesi tingini.
9 Og tá ið teir høvdu tikið trygd av Jā´-sŏn-i, og av hīnum, lótu teir teir fara.
10 ¶ Og brøðurnir alt fyri eitt sendu Paulus og Silas avstað um nátt*ina* til Bē-rø´-ŭ: hvørjir, komandi *hagar,* fóru inn í sýnagoguna hjá Jødunum.

11 Hesir vóru meiri ediligir enn
teir í Thëss-ă-lō´-nī-cŭ, í at teir tóku
ímóti orðinum við øllum fúsleika
av huga, og kannaðu skriftirnar
dagliga, hvørt tey tingini vóru so.
12 Tí trúðu mangir av teimum;
eisini av ærumiklum kvinnum
sum vóru Grikskar, og av monn-
um, ikki fáir.
13 Men tá ið Jødarnir av Thëss-
ă-lō´-nī-cū høvdu kunnleika *um,* at
Guðs orð varð prædikað av Paul-
usi í Bē-rø´-ŭ, komu teir hagar
eisini, og østu upp fólkið.
14 Og alt fyri eitt sendu brøður-
nir tá Paulus avstað, at fara sum
var tað til sævarins: men Silas og
Timotheus steðgaðu har enn.
15 Og teir, sum leiddu Paulus,
førdu hann til Athēn: og, mót-
takandi Silasi og Timotheusi eini
boð fyri at koma til hansara við
øllum skjótleika, fóru teir avstað.
16 ¶ Nú, meðan Paulus bíðaði
eftir teimum í Athēn, varð hans
andi rørdur í honum, tá hann sá
staðin heil*vegis* givnan til skurð-
gudadýrkanar.
17 Tí røddi hann í sýnagoguni
við Jødarnar, og við teir frómu per-
sónarnar, og á torginum dagliga
við teir sum hittust við hann.
18 Ávísir heimspekingar av hin-
um Ē-pī-cū´-rī-skŭ, og av hinum
Stó´-īsk-ŭ, tá truffust á *við* hann.
Og summir søgdu, Hvat vil hes-
in geiparin siga? summir aðrir,
Hann tykist at vera ein leggjari
fram av fremmandum gudum:
av tí at hann prædikaði teimum
Jesus, og uppreisnina.
19 Og teir tóku hann, og førdu
hann til Ăr-ĕ-ōp´-ă-gŏs, sigandi,
Mega vit vita, hvat henda nýggja
Guðslæra, um hvørja tú talart, *er?*
20 Tí at tú førirt ávís undar-
lig ting til oyrna vára: vit vildu
vitað, tessvegna, hvat hesi tingini
merkja.
21 (Tí at allir Athēniararnir og
hinir fremmandu, sum vóru har,
brúktu sína tíð í ongum øðrum,
uttan annaðhvørt at siga, ella at
hoyra okkurt nýtt ting.)
22 ¶ Tá stóð Paulus á miðjum
Mars heyggi, og segði, *Tit* menn
av Athēn, eg varnist at tit í øllum
lutum eru ov pátrúnir.
23 Tí at sum eg fór framvið, og
skoðaði tykkara tilbiðjingar, fann
eg eitt altar við hesi áskrift, TIL
HIN ÓKUNNA GUÐ. Hvønn,
tessvegna, tit fákunnugliga tilbið-
ja, hann kunngeri eg tykkum.
24 Guð, sum gjørdi verøldina
og øll ting harí, við tað at hann er
Harri himins og jarðar, býr ikki í
templum, gjørdum við hondum;
25 Eiheldur verður tilbiðin við
mannahondum, sum um honum
tørvaði nakað ting, við tað at hann
gevur til alra lív, og andadrátt, og
øll ting;
26 Og hevur gjørt av ēinum
blóði allar tjóðir manna fyri at
dvøljast á allari ásjón jarðarinnar,
og hevur ásett tíðirnar – fyrifram
fyriskipaðar, og mørkini av teirra
bústaði;
27 At teir skuldu søkja Harran,
um møguliga teir máttu trilvað
eftir honum, og funnið hann, hó-
ast hann veri ikki fjart frá hvørj-
um *og* ēinum av okkum:
28 Tí at í honum liva vit, og rør-
ast, og hava veran vára; eins og
ávísir eisini av tykkar egnu skald-
um hava sagt, Tí at vit eru eisini
avkom hansara.
29 Við tað tá at vit eru avkom
Guðs, áttu vit ikki at hugsað, at
Guðhøvdið er líkt gulli, ella silv-
uri, ella steini, tilevnað við list*a-
kynstri* og páfundi mans.
30 Og tíðirnar av hesi fákunnu
læt Guð fara afturvið borðinum;
men nú býður øllum monnum
allar staðir at venda um:
31 Av tí at hann hevur útpeikað
ein dag, í hvørjum hann vil døma
heimin í rættvísi við^ *tí* manni,
hvønn hann hevur fyriskipað;

hvarum hann hevur givið øllum *monnum* fullvissu, í at hann hevur reist hann frá teimum deyðu.

32 ¶ Og tá ið teir hoyrdu um uppreisnina av teimum deyðu, háðaðu summir: og aðrir søgdu, Vit vilja hoyra teg aftur um hetta *mál*.

33 So Paulus fór avstað frá teirra millum.

34 Hvussu enn er, ávísir menn krøktu *seg* at honum, og trúðu: hvørja millum *var* Ar-ĕ-ōp-ă-gīt´-in Dī-ô-nýs´-ĭ-ŭs, og ein kvinna nevnd Dă-mā´-rīs, og onnur við teimum.

KAPITUL 18

EFTIR hesi ting fór Paulus avstað úr Athēn, og kom til Corinth;

2 Og fann ein ávísan Jøda, nevndur Ă-quī´-lăs, føddur í Pontus, nýliga komin frá Italiu, við konu síni Prisçillu; (av tí at Claudius hevði boðið øllum Jødum at fara avstað frá Róm:) og kom til teirra.

3 Og, av tí at hann var av hinum sama handverki, varð hann *verandi* hjá teimum, og arbeiddi: tí at av sínum yrki vóru teir tjaldmakarar.

4 Og hann skifti orð í sýnagoguni hvønn sabbat, og sannførdi Jødarnar og Grikkarnar.

5 Og tá ið Silas og Timotheus vóru komnir frá Măc-ĕ-dō´-nī-ŭ, var Paulus kroystur í andanum, og vitnaði fyri Jødunum, *at* Jesus *var* Christus.

6 Og tá ið teir settu seg ímóti, og Guðsspottaðu, risti hann *sín* klædnað, og segði við teir, Blóð tykkara *veri* uppiá tykkara egnu høvdum; eg *eri* reinur: hiðanífrá vil eg fara til Heidningarnar.

7 ¶ Og hann fór avstað haðani, og fór inn í húsið hjá einum ávísum *manni*, nevndur Justus, *ēin* sum tilbað Guð, hvørs hús lá tætt uppat sýnagoguni.

8 Og Crĭs´-pŭs, fremsti stjórnarin av sýnagoguni, trúði á Harran við øllum húsi sínum; og mangir av Corintharunum, hoyrandi, trúðu, og vórðu doyptir.

9 Tá talaði Harrin til Paulusar um náttina viðˆ eini sjón, Ver ikki ræddur, men tala, og halt ikki tøgn tíni:

10 Tí at eg eri við tær, og eingin maður skal leggja á teg til at meina teg: tí at eg havi nógv fólk í hesum staði.

11 Og hann helt áfram *har* eitt ár og seks mánaðir, frálærandi Guðs orð teirra millum.

12 ¶ Og tá ið Găl´-lĭ-ô var fulltrúin av Ă-chāĭ´-ŭ, gjørdu Jødarnir uppreist við ēinum samljóði ímóti Paulusi, og førdu hann til dómstólin,

13 Sigandi, Hesin *felagin* yvirtalar menn at tilbiðja Guð mótsatt við lógina.

14 Og tá ið Paulus var nú um at lata upp munn *sín*, segði Găl´-lĭ-ô við Jødarnar, Um tað var eitt mál um rangt ella vont teymaloysi, O *tit* Jødar, vildi grund *verið fyri* at eg skuldi borið yvir við tykkum:

15 Men um tað veri ein spurningur um orðˇ og nøvn, og *um* lóg tykkara, hyggið tit *til tess;* tí at eg vil eingin dómari vera í slíkum *málum*.

16 Og hann rak teir frá dómstólinum.

17 Tá tóku allir Grikkarnir Sōs´-thê-nēs, hin fremsta stjórnaran av sýnagoguni, og bardu *hann* frammi fyri dómstólinum. Og Găl´-lĭ-ô legði ikki í nakað av teimum tingunum.

18 ¶ Og Paulus *eftir hetta* dvaldi *har* enn eina góða stund, og síðan tók sína skilnaðarkvøðu við brøðurnar, og sigldi haðan inn í Sýriu, og við honum Prisçilla og Ă-quī´-lās; havandi *hár*skorið *sær* høvdið í Cĕn-chrē´-ŭ: tí at hann hevði eitt lyfti.

19 Og hann kom til Ē′-phĕ-sūs, og eftirlæt tey har: men sjálvur fór hann inn í sýnagoguna, og skifti orð við Jødarnar.
20 Tá ið teir tráaðu *hann* at steðga longri tíð hjá teimum, samtykti hann ikki;
21 Men beyð teim farvæl, sigandi, Eg má viðˆ øllum brøgdum halda hesa hátíðina, sum kemur, í Jerusalem: men eg vil koma aftur aftur til tykkara, um Guð vilji. Og hann sigldi frá Ē′-phē-sūs.
22 Og tá ið hann var *komin at* landi í Çæ-sâ-rē′-ū, og farin niðan, og *hevði* heilsað kirkjuni, fór hann oman til Ăn-tī-ō′-chĭ-ū.
23 Og eftir *at* hann hevði brúkt nakað av tíð *har,* fór hann avstað, og fór yvir *alt* land Galatiu og Phrý′-gĭ-ū í raðfylgju, styrkjandi allar lærusveinarnar.
24 ¶ Og ein ávísur Jødi, nevndur Ă-pōl′-lōs, føddur í Alexandriu, ein væltalandi maður, *og* mektigur í skriftunum, kom til Ē′-phē-sūs.
25 Hesin maðurin var undirvístur í vegi Harrans; og, verandi brennandi í andanum, talaði hann og frálærdi greiniligani lutir Harrans, kennandi einans dóp Jóhannesar.
26 Og hann byrjaði at tala djarvligani í sýnagoguni: hvønn, tá ið Ă-quĭ′-lăs og Prisçilla høvdu hoyrt, tey tóku hann at *sær,* og útløgdu honum veg Guðs meiri fullkomiliga.
27 Og tá ið hann var sinnaður at fara inn í Â-chaî′-ū, skrivaðu brøðurnir, formanandi lærusveinarnar at taka ímóti honum: hvør, tá hann var komin, hjálpti teimum mikið sum høvdu trúð gjøgn náði:
28 Tí hann mektigani sannførdi Jødarnar, *og tað* almennligani, sýnandi viðˆ skriftunum, at Jesus var Christus.

KAPITUL 19

OG tað bar á, at meðan Ă-pōl′-lōs var í Corinth, Paulus, havandi farið ígjøgnum teir ovaru breddarnar, kom til Ē′-phĕ-sūs: og, finnandi ávísar lærusveinar,
2 Segði hann við teir, Hava tit tikið ímóti Halga Andanum, síðan tit trúðu? Og teir søgdu við hann, Vit hava ikki so mikið sum hoyrt, hvørt tað veri nakar Halgur Andi.
3 Og hann segði við teir, At hvørjum vórðu tit tá doyptir? Og teir søgdu, At dópi Jóhannesar.
4 Tá segði Paulus, Jóhannes sanniliga doypti við umvendingardópinum, sigandi við fólkið, at tey skuldu trúgva á hann sum skuldi koma eftir hann, tað er, á Christ Jesus.
5 Tá ið teir hoyrdu *hetta,* vórðu teir doyptir í navni Harrans Jesu.
6 Og tá ið Paulus hevði lagt *sínar* hendur uppá teir, kom Halgi Andin á teir; og teir talaðu við tungum, og propheteraðu.
7 Og allir menninir vóru umleið tólv.
8 Og hann fór inn í sýnagoguna, og talaði djarvligani í skeiðið á tríggjar mánaðir, samrøðandi og sannførandi tingini viðvíkjandi kongadømi Guðs.
9 Men tá ið ymsir vórðu herdaðir, og trúðu ikki, men talaðu ilt um tann vegin frammi fyri mannfjøldini, fór hann avstað frá teimum, og skildi lærusveinarnar frá, samrøðandi dagligani í skúlanum hjá ēinum Tý-răn-nŭs-i.
10 Og hetta helt áfram yvir bilið á tvey ár; so at allir teir, sum dvaldust í Asiu, hoyrdu orð Harrans Jesu, bæði Jødar og Grikkar.
11 Og Guð virkaði serlig kraftarverk viðˆ hondum Paulusar:
12 So at frá hansara likami vórðu førd at teimum sjúku sveittadúkar ella svintur, og sjúkdómarnir viku

frá teimum, og teir illu andarnir fóru út úr teimum.

13 ¶ Ávísir av hinum umstrúkandi Jødunum, djevla-útdrívarum, tá tóku uppá seg at kalla yvir tey, sum høvdu illar andar, navn Harrans Jesu, sigandi, Vit svørja tykkum við Jesus, hvønn Paulus prædikar.

14 Og har vóru sjey synir hjá *ēinum* Scĕ-vă, einum Jøda, *og* hægsta av prestunum, sum so gjørdu.

15 Og hin illi andin svaraði og segði, Jesus kenni eg, og Paulus kenni eg; men hvørjir eru tit?

16 Og maðurin, í hvørjum illi andin var, leyp á teir, og vann yvir teimum, og hevði yvirvág ímóti teimum, so at teir flýddu út úr tí húsinum naknir og særdir.

17 Og hetta varð kunnugt fyri øllum Jødunum og Grikkunum, eisini búgvandi í Ē′-phĕ-sūs; og ótti fell á teir allar, og navn Harrans Jesu varð hámett.

18 Og mong, sum trúðu, komu, og játtaðu, og sýndu sínar gerðir.

19 Mong av teimum eisini, sum brúktu dularfull kynstur, førdu bøkur sínar saman, og brendu tær frammi fyri øllum *monnum:* og teir taldu virðið á teimum, og funnu *tað* fimti túsund *stykkir* av silvuri.

20 So mektigani vaks Guðs orð og sigraði.

21 ¶ Eftir *at* hesi tingini vóru endaði, avráddi Paulus í andanum, tá hann var farin ígjøgnum Măc-ĕ-dō′-nī-ŭ og Â-chā′ī-ŭ, at fara til Jerusalem, sigandi, Eftir *at* eg havi verið har, má eg eisini síggja Róm.

22 So hann sendi inn í Măc-ĕ-dō′-nī-ŭ tveir av teimum sum tæntu at honum, Timotheus og Ē-răs′-tŭs; men sjálvur hann steðgaði í Asiu í eina tíð.

23 Og ta somu tíðina reis tað eingin smá*vegis* øsingur um tann vegin.

24 Tí ein ávísur *maður,* nevndur Dē-mē′-trī-ŭs, ein silvursmiður, sum gjørdi silvur halgidómar til Dianu, førdi handverksmonnunum ongan smá*vegis* vinning;

25 Hvørjar hann kallaði saman við arbeiðsmonnunum av líkum yrki, og segði, Harrar, tit vita at av hesum handverki hava vit okkara ríkidømi.

26 Harafturat síggja tit og hoyra, at ikki eina í Ē′-phĕ-sūs, men nærum út gjøgnum alla Asiu, hevur hesin Paulus yvirtalað og vent burtur nógvum fólki, sigandi, at teir veri eingir gudar, sum eru gjørdir við hondum:

27 So at ikki einans hetta handverk várt er í vanda *fyri* at verða gjørt til einkiðs; men eisini at tempul hinnar miklu gudinnu Dianu skuldi verðið vanvirt, og hennara hátign skuldi verðið oydd, hvørja øll Asia og heimurin tilbiður.

28 Og tá ið teir hoyrdu *hesar framsagnir,* vórðu teir fullir av vreiði, og geylaðu út, sigandi, Mikil *er* Diana Ê-phē′s-aranna.

29 Og allur staðurin varð fyltur við ørkymlan: og, havandi gripið Gâ ī′-ŭs og Âr-ĭs′-târ-chŭs, menn úr Măc-ĕ-dō′-nī-ŭ, ferðafelagar Paulusar, stormaðu teir við ēinum samljómi inn í leikhøllina.

30 Og tá ið Paulus vildi havt farið inn til fólkið, loyvdu lærusveinarnir honum ikki.

31 Og ávísir av hinum hægstu av Asiu, sum vóru vinir hansara, sendu til hansara, tráandi *hann,* at hann vildi ikki hættað sær inn í leikhøllina.

32 Summir tí geylaðu ēitt ting, og summir eitt annað: tí at savnaðurin var ørkymlaður; og meginparturin vitsti ikki hvørsvegna teir vóru komnir saman.

33 Og teir drógu Alexander út úr mannfjøldini, Jødarnir sendandi hann frameftir. Og Alexander gjørdi tekin við hondini, og vildi havt hildið sína verju yvirfyri fólkinum.

34 Men tá ið teir vitstu at hann var Jødi, geylaðu allir út við ēinari rødd í umleið skeiðið á tveir tímar, Mikil *er* Diana Ê-phēs´-aranna.

35 Og tá ið býarskrivarin hevði sissað fólkið, segði hann, *Tit* menn úr Ē´-phē-sūs, hvør maður er tað, sum veit ikki hvussu ið staðurin hjá Ê-phēs´-arunum er ein tilbiðjari av hini miklu gudinnu Dianu, og av *myndini* sum fell niður frá Jupiter?

36 Við tað tá at hesi ting kunnu ikki verða talaði ímóti, áttu tit at verið stillir, og at gjørt einkið bráðræsnisliga.

37 Tí at tit hava ført higar hesar menn, sum eru hvørki rænarar av kirkjum, ella tá spottarar av tykkara gudinnu.

38 Hvørsvegna, um Dê-mē´-trĭus, og teir handverksmenninir sum við honum eru, havi eitt mál ímóti nøkrum manni, lógin er opin, og tað finnast fulltrúar: klagi teir hvør annan.

39 Men um tit fregnist um nakað viðvíkjandi øðrum málum, *so* skal tað verða avgjørt á lógligum fundi.

40 Tí at vit eru í vanda *fyri* at verða kallaðir í forhoyr fyri ófriðin av hesum degi, tað verandi eingin grund, við hvørji vit mega geva greiðu fyri hesum tilrendi.

41 Og tá ið hann svá hevði talað, læt hann savnaðin fara.

KAPITUL 20

OG eftir *at* ófriðurin var hæsaður av, kallaði Paulus lærusveinarnar at *sær,* og umfevndi *teir,* og fór avstað fyri at fara inn í Măc-ĕ-dŏ´-nĭ-ŭ.

2 Og tá ið hann var farin yvir teir partarnar, og hevði givið teimum nógva formaning, kom hann inn í Grikkaland,

3 Og varð *har í* tríggjar mánaðir. Og tá ið Jødarnir lógu *uppá* lúr eftir honum, sum hann var um at sigla inn í Sýriu, avráddi hann at venda aftur ígjøgnum Măc-ĕ-dŏ´-nĭ-ŭ.

4 Og tað vóru í fylgi við honum inn í Asiu Sō´-pă-tĕr úr Bê-rø´-ŭ; og av Thĕss-ă-lŏ´-nĭc-arunum, Âr-ĭs´-târ-chŭs og Sē-cŭn´-dŭs; og Gâĭ´-ŭs úr Dĕr´-bê, og Timotheus; og úr Asiu, Tў́ch´-ĭ-cŭs og Trō´-phĭ-mŭs.

5 Hesir, farandi undan, bíðaðu eftir okkum í Trō´-ăs.

6 Og vit sigldu avstað frá Philippī eftir dagar ósúrgaðs breyðs, og komu til teirra til Trō´-ăs á fimm døgum; har vit vórðu *í* sjey dagar.

7 Og uppá hin fyrsta *dag* vikunnar, tá ið lærusveinarnir komu saman at bróta breyð, prædikaði Paulus teimum, klárur at fara avstað um morgunin; og helt áfram sína talu inntil midnátt.

8 Og har vóru mong ljós í tí ovara kamarinum, har teir vóru savnaðir saman.

9 Og har sat í einum glugga ein ávísur ungur maður, nevndur Ēv´-tў-chŭs, verandi fallin inn í ein djúpan svøvn: og sum Paulus var leingi prædikandi, sakk hann niður við svøvni, og datt niður frá triðja loftinum, og varð tikin upp deyður.

10 Og Paulus fór oman, og fell á hann, og umfevnandi *hann* segði, Órógvið ikki tykkum sjálvar; tí at hansara lív er í honum.

11 Tá ið hann tí var komin upp aftur, og hevði brotið breyð, og etið, og talað eina langa stund, enntá til tað lýsti fyri degi, so fór hann avstað.

12 Og teir førdu tann unga mannin livandi, og vórðu ikki sørt uggaðir.

13 ¶ Og vit fóru undan til skips, og sigldu til Ăs´-sŏs, har ætlandi at taka uppí Paulus: tí at soleiðis hevði hann skipað fyri, ætlandi sjálvur at fara til fóts.

14 Og tá ið hann møttist við okkum í Ǎs´-sŏs, tóku vit hann uppí, og komu til Mĭ-tў-lē´-nē.
15 Og vit sigldu haðani, og komu tann næsta *dagin* yvir av Chĭ´-ŏs; og tann næsta *dagin* komu vit fram í Sā´-mŏs, og dvaldu í Trō-gўl´-lĭ-ŭm; og tann næsta *dagin* komu vit til Mĭ-lē´-tŭs.
16 Tí at Paulus hevði avrátt at sigla um Ē´-phē-sŭs, av tí at hann vildi ikki brúka tíðina í Asiu: tí at hann skundaði *sær,* um tað var møguligt hjá honum at verða í Jerusalem Hvítusunnudagin.
17 ¶ Og frá Mĭ-lē´-tŭs sendi hann til Ē´-phē-sŭs, og kallaði hinar elstu av kirkjuni.
18 Og tá ið teir vóru komnir til hansara, segði hann við teir, Tit vita, frá hinum fyrsta degi sum eg kom inn í Asiu, eftir hvørjum háttarlagi eg havi verið hjá tykkum til allar tíðir,
19 Tænandi Harranum við øllum eyðmjúkleika av sinni, og við mongum tárum, og freistingum, sum viðfórust mær við liggjanini á lúri av Jødunum:
20 *Og* hvussu eg helt aftur einkið sum var gagnligt *tykkum,* men havi sýnt tykkum, og havi lært tykkum almennligani, og frá húsi til húss,
21 Vitnandi bæði fyri Jødunum, og eisini fyri Grikkunum, umvending mótvegis Guði, og trúgv mótvegis Harra okkara Jesusi Christi.
22 Og nú, sí, eg fari bundin í andanum til Jerusalem, ei vitandi tey ting sum skulu viðfarast mær har:
23 Uttan at Halgi Andin vitnar í hvørjum staði, sigandi at bond og líðingar bíða mær.
24 Men eingi av hesum tingunum vika meg, eiheldur rokni eg mítt lív mær sjálvum kært, so at eg mátti fullført mítt skeið við gleði, og tænastuna sum eg havi móttikið av Harranum Jesusi, at vitna gleðiboðskap náðar Guðs.
25 Og nú, sí, eg veit at tit allir, hvørja millum eg havi gingið prædikandi kongadømi Guðs, skulu síggja mítt andlit ei meira.
26 Hvørsvegna eg taki tykkum til vitnis henda dag, at eg *eri* reinur frá blóðinum av øllum *monnum.*
27 Tí at eg havi ikki skýggjað at kunngera tykkum alt Guðs ráð.
28 ¶ Gevið gætur, tessvegna, eftir tykkum sjálvum, og eftir øllum fylginum, yvir hvørt Halgi Andin hevur gjørt tykkum umsjónarmenn, at føða kirkju Guðs, sum hann hevur keypt við sínum egna blóði.
29 Tí at eg veit hetta, at eftir mína burturferð skulu herviligir úlvar koma inn tykkara millum, ei sparandi fylgið.
30 Eisini av sjálvum tykkar egnu skulu menn rísa, talandi rangvørg ting, til at draga burt lærusveinar eftir sær.
31 Tessvegna vakið, og minnist til, at yvir skeiðið á trý ár gavst eg ikki at ávara hvønn *og* ēin nátt og dag við tárum.
32 Og nú, brøður, eg líti tykkum upp til Guðs, og til náðarorðs hansara, sum er ført fyri at byggja tykkum upp, og at geva tykkum arvalut millum alra teirra sum eru halgaðir.
33 Eg havi girnast ongan mans silvur, ella gull, ella skart.
34 Ja, tit sjálvir vita, at hesar hendur hava tænt at mínum neyðsynjum, og fyri teimum sum við mær vóru.
35 Eg havi sýnt tykkum øll ting, hvussu ið soleiðis arbeiðandi, tit áttu at stuðla teimum veiku, og at minnast orð´ Harrans Jesu, hvussu hann segði, Tað er meira vælsignað at geva enn at fáa.
36 ¶ Og tá ið hann svá hevði talað, knelaði hann niður, og bað við teim øllum.

37 Og teir grótu allir sáran, og fullu um háls Paulusar, og kystu hann,
38 Syrgjandi mest av øllum vegna orðini sum hann talaði, at teir skuldu síggja hans andlit ei meira. Og teir fylgdu honum at skipinum.

KAPITUL 21

OG tað bar á, at eftir *at* vit vóru slopnir frá teimum, og høvdu lagt út, komu vit við eini beinari kós til Cṓ-ōs, og hin fylgjandi *dagin* til Rhodos, og haðani frá til Păt-ā́-ră:
2 Og finnandi eitt skip, siglandi yvir at Phø-nĭ́-çi-ŭ, fóru vit umborð, og løgdu út.
3 Nú, tá ið vit høvdu varnast Cýpros, eftirlótu vit hana á vinstru síðu, og sigldu inn í Sýriu, og *løgdu at* landi í Týrus: tí at har átti skipið at leggja upp farm sín.
4 Og finnandi lærusveinar, dvaldu vit har sjey dagar: hvørjir søgdu til Paulusar, gjøgnum Andan, at hann skuldi ikki fara niðan til Jerusalem.
5 Og tá ið vit høvdu fullført teir dagarnar, hildu vit avstað og fóru okkara veg; og teir allir førdu okkum á okkara vegi, við konum og børnum, til *vit vóru* úti úr staðinum: og vit knelaðu niður á sjóvarmálanum, og bóðu.
6 Og tá ið vit vóru skilst hvørt frá øðrum, tóku vit skip; og tey vendu heim aftur.
7 Og tá ið vit høvdu fullført kós *okkara* frá Týrus, komu vit til Ptōl-ĕ-mā́-ĭs, og heilsaðu brøðrunum, og vórðu hjá teimum *í* ēin dag.
8 Og hin næsta *dagin* vit, sum vóru av samlagi Paulusar, fóru avstað, og komu til Çæ-sâ-rḗ-ŭ: og vit fóru inn í húsið hjá Philippusi evangelisti, sum var *ēin* av teimum sjey; og vórðu hjá honum.
9 Og hin sami maðurin hevði fýra døtur, jomfrýr, sum propheteraðu.
10 Og sum vit dvaldu *har í* mangar dagar, kom tað oman frá Judæu ein ávísur prophetur, nevndur Ăg´-ă-bŭs.
11 Og tá ið hann var komin til okkara, tók hann gyrðilin hjá Paulusi, og bant sínar egnu hendur og føtur, og segði, Svá sigur Halgi Andin, Soleiðis skulu Jødarnir í Jerusalem binda tann mannin sum eigur henda gyrðilin, og skulu geva *hann* yvir í hendurnar á Heidningunum.
12 Og tá ið vit hoyrdu hesi ting, bønaðu bæði vit, og teir av tí staðnum, hann *um* ikki at fara niðan til Jerusalem.
13 Tá svaraði Paulus, Hvat meina tit *við* at gráta og bróta mítt hjarta? tí at eg eri tilreiðar, ikki at verða bundin einans, men eisini at doyggja í Jerusalem fyri navn Harrans Jesu.
14 Og tá ið hann vildi ikki verða yvirtalaður, góvust vit, sigandi, Vilji Harrans veri gjørdur.
15 Og eftir teir dagarnar tóku vit upp okkara viðførningar, og fóru niðan til Jerusalem.
16 Tað fóru við okkum eisini *ávísir* av lærusveinunum úr Çæ-sâ-rḗ-ŭ, og førdu við sær ēin Mnā́-sŏn úr Cýpros, ein gamlan lærusvein, hjá hvørjum vit skuldu halda til.
17 Og tá ið vit vóru komnir til Jerusalem, tóku brøðurnir ímóti okkum gleðiliga.
18 Og hin fylgjandi *dagin* fór Paulus inn við okkum til Jákobs; og allir teir elstu vóru hjástaddir.
19 Og tá ið hann hevði heilsað teimum, greiddi hann frá, hvørt fyri seg, hvørji ting Guð hevði virkað Heidninganna millum við hansara tænastu.
20 Og tá ið teir hoyrdu *tað*, dýrðmettu teir Harran, og søgdu

við hann, Tú sært, bróðir, hvussu mong túsundir av Jødum tað eru sum trúgva; og teir eru allir vandlátir um lógina:

21 Og teir eru kunnaðir um teg, at tú lærirt allar Jødarnar, sum eru Heidninganna millum, at yvirgeva Móses, sigandi at teir áttu ikki at umskera *síni* børn, eiheldur at ganga eftir venjunum.

22 Hvat er tí at *gera?* mannfjøldin má neyðugt koma saman: tí at tey fara at hoyra at tú ert komin.

23 Ger tí hetta sum vit siga til tín: Vit hava fýra menn, sum hava eitt heiti á sær;

24 Teir tak, og reinsa teg við teimum, og statt til skulda við teimum, at teir mega raka *síni* høvur: og allir mega vita at teir lutir, hvarum teir vórðu kunnaðir viðvíkjandi tær, eru einkið; men *at* tú sjálvur eisini gongurt reglusamliga, og heldurt lógina.

25 Hvat Heidningunum, sum trúgva, viðvíkur, hava vit skrivað *og* avgjørt, at teir gái eftir ongum slíkum tingi, uttan einans at teir haldi seg frá *lutum* — ofraðum til skurðguda, og frá blóði, og frá kvaldum, og frá siðloysi.

26 Tá tók Paulus menninar, og hin næsta dagin, skírgandi seg við teimum, fór inn í templið, at frámerkja fullføringina av skírganardøgunum, inntil ið eitt offur skuldi verða ofrað fyri hvønn *og* ein teirra.

27 Og tá ið teir sjey dagarnir vóru næstan endaðir, Jødarnir sum vóru úr Asiu, tá ið teir sóu hann í templinum, østu upp alt fólkið, og løgdu hendur á hann,

28 Rópandi út, Menn av Ísrael, hjálpið: Hetta er maðurin sum lærir allar *menn* allar staðir ímóti fólkinum, og lógini, og hesum plássinum: og viðari førdi eisini Grikkar inn í templið, og hevur dálkað hetta heilaga plássið.

29 (Tí at teir høvdu sæð frammanundan við honum í staðinum Trō-phĭ-mŭs, ein Ê-phē-sĭara, hvønn teir hildu at Paulus hevði ført inn í templið.)

30 Og allur staðurin varð rørdur, og fólkið rann saman: og teir tóku Paulus, og drógu hann út úr templinum: og við tað sama vórðu dyrnar˘ afturlatnar.

31 Og sum teir lógu úti eftir at drepa hann, komu tíðindir til hin fremsta herovastan av liðinum, at alt Jerusalem var í einum uppstigi.

32 Sum í stundini tók hermenn og hundraðsovastar, og rann oman til teirra: og tá ið teir sóu fremsta herovastan og hermenninar, lótu teir av berjing av Paulusi.

33 Tá kom fremsti herovastin nær, og tók hann, og beyð *hann* at verða bundnan við tveim ketum; og kravdist *vita* hvør hann var, og hvat hann hevði gjørt.

34 Og summir rópaðu ēitt ting, *og* summir eitt annað, millum mannfjøldina: og tá hann kundi ikki vita vissuna fyri ófriðinum, beyð hann hann at verða førdan inn í borgina.

35 Og tá ið hann kom upp á trappurnar, var tað so, at hann varð borin av hermonnunum fyri harðskapin av fólkinum.

36 Tí at fjøldin av fólkinum fylgdi aftaná, rópandi, Burtur við honum.

37 Og sum Paulus átti at verða leiddur inn í borgina, segði hann við tann fremsta herovastan, Kann eg tala við teg? Hvør segði, Dugirt tú tala Grikskt?

38 Ert ikki tú hasin Egyptin, sum undan hesum døgum gjørdirt uppreist, og leiddirt út í oyðuna fýra túsund menn sum vóru myrðarar?

39 Men Paulus segði, Eg eri ein maður *sum eri* ein Jødi úr Tarsus, *einum staði* í Çĭ-lĭ-çĭ-ŭ, ein borgari av ongum meinigum staði: og,

eg bøni teg, loyv mær at tala til fólkið.

40 Og tá ið hann hevði givið honum loyvisváttan, stóð Paulus á trappunum, og gjørdi tekin við hondini til fólkið. Og tá ið har varð gjørd ein mikil tøgn, talaði hann til *teirra* á hini Hebrāisku tungu, sigandi,

KAPITUL 22

1 MENN, brøður og fedrar, hoyrið tit mína verju *sum eg haldi* nú at tykkum.

2 (Og tá ið teir hoyrdu, at hann talaði á hini Hebrāisku tungu til teirra, hildu teir tess meiri tøgn: og hann sigur,)

3 Eg eri sanniliga ein maður *sum eri* ein Jødi, føddur í Tarsus, *einum staði* í Çĭ-lĭ´-çĭ-ŭ, tó aldur upp í hesum staði við Gă-mă´-lĭ-ĕl-s føtur, *og* lærdur samsvarandi við hitt fullkomna háttarlag fedralógarinnar, og var vandlátur mótvegis Guði, eins og tit allir eru henda dag.

4 Og eg søkti at hesum vegi til deyðan, bindandi og gevandi upp í fongsul˘ bæði menn og kvinnur.

5 Sum eisini høvuðspresturin ber mær vitnisburð, og øll stætt hinna elstu: frá hvørjum eisini eg tók ímóti brøvum til brøðurnar, og fór til Damascus, at føra tey, sum har vóru bundin, til Jerusalem, fyri at verða revsað.

6 Og tað bar á, at sum eg gjørdi ferð mína, og var komin nær at Damascus um middag, brádliganí skein tað frá himni eitt mikið ljós rundan um meg.

7 Og eg fell til jarðarinnar, og hoyrdi eina rødd, sigandi við meg, Saul, Saul, hví søkirt tú at mær?

8 Og eg svaraði, Hvør ert tú, Harri? Og hann segði við meg, Eg eri Jesus úr Nazareth, hvørjum tú søkirt at.

9 Og teir, sum vóru við mær, sóu víst ljósið, og vórðu ræddir; men teir hoyrdu ikki røddina á honum sum talaði til mín.

10 Og eg segði, Hvat skal eg gera, Harri? Og Harrin segði við meg, Reis *teg*, og far inn í Damascus; og har skal tað verða sagt tær um øll ting sum eru fyriskipaði til tín at gera.

11 Og tá ið eg kundi ikki síggja fyri dýrdina av tí ljósinum, verðandi leiddur við˘ hondini av teimum sum vóru við mær, kom eg inn í Damascus.

12 Og ēin Ăn-ă-nī´-ăs, ein frómur maður samsvarandi við lógina, havandi gott ummæli av øllum Jødunum sum dvaldust *har*,

13 Kom til mín, og stóð, og segði við meg, Bróðir Saulus, móttak sjón tína. Og hin sama tíma hugdi eg upp uppá hann.

14 Og hann segði, Guð fedra vára hevur *út*valt teg, at tú skuldirt kenna vilja hansara, og síggja Hin Rættvísa, og skuldirt hoyra røddina av hansara munni.

15 Tí at tú skalt vera hansara vitni yvirfyri øllum monnum um tað *sum* tú hevurt sæð og hoyrt.

16 Og nú, hví drálart tú? reis *teg*, og verð doyptur, og tváa burt tínar syndir, kallandi á navn Harrans.

17 Og tað bar á, at tá ið eg var komin aftur til Jerusalem, enntá meðan eg bað í templinum, var eg í eini transu;

18 Og sá hann sigandi við meg, Kvika tær, og kom tær skundisliganí út úr Jerusalem: tí at teir vilja ikki taka ímóti tínum vitnisburði viðvíkjandi mær.

19 Og eg segði, Harri, teir vita at eg fongslaði og bardi í hvørji sýnagogu tey sum trúðu á teg:

20 Og tá ið blóðið á tínum Martýri Stephani varð úthelt, stóð eg eisini hjá, og samtykti at hansara deyða, og varðaði klædnaðin hjá teimum sum drópu hann.

21 Og hann segði við meg, Far avstað: tí at eg vil senda teg langt hiðani til Heidninganna.

22 Og teir góvu honum áhoyrn at hesum orði, og *síðan* lyftu upp sínum røddum, og søgdu, Burtur við einum slíkum *felaga* frá jørðini: tí at tað er ikki sømiligt at hann skuldi livað.

23 Og sum teir geylaðu út, og kastaðu av *síni* klæðir, og tveittu dust *upp* í luftina,

24 Skipaði hin fremsti herovastin at hann *skuldi* verða førdur inn í borgina, og beyð at hann skuldi verða avhoyrdur við húðfletting; at hann mátti vita hvørsvegna teir geylaðu so ímóti honum.

25 Og sum teir bundu hann við reimum, segði Paulus við hundraðsovastan sum stóð hjá, Er tað lógligt hjá tykkum at húðfletta ein mann sum er ein Rómverji, og *tað* ódómfeldan?

26 Tá ið hundraðsovastin hoyrdi *tað,* fór hann og segði tí fremsta herovastanum *frá,* sigandi, Gev gætur *eftir* hvat tú gert: tí hesin maðurin er ein Rómverji.

27 Tá kom fremsti herovastin, og segði við hann, Sig mær, ert tú ein Rómverji? Hann segði, Ja.

28 Og hin fremsti herovastin svaraði, Við miklari upphædd vann eg hetta frælsi. Og Paulus segði, Men eg varð *frí*borin.

29 Tá beinanvegin fóru teir avstað frá honum, sum skuldu havt avhoyrt hann: og hin fremsti herovastin eisini varð ræddur, eftir *at* hann vitsti at hann var ein Rómverji, og av tí at hann hevði bundið hann.

30 Um morgunin, av tí at hann vildi havt vitað vissuna *um* hvørsvegna hann varð ákærdur av Jødunum, loysti hann hann frá *hansara* bondum, og skipaði fremstu prestunum og øllum teirra ráði at birtast, og førdi Paulus oman, og stillaði hann framfyri teir.

KAPITUL 23

OG Paulus, álvarsamligani skoðandi ráðið, segði, Menn *og* brøður, eg havi livað í allari góðari samvitsku frammi fyri Guði inntil henda dag.

2 Og høvuðspresturin Ăn-ă-nī´-ăs beyð teimum ið stóðu hjá honum at sláa hann á munnin.

3 Tá segði Paulus við hann, Guð skal sláa teg, *tín* kálkaði veggur: tí siturt tú til at døma meg eftir lógini, og býðurt meg at verða slignan mótsatt við lógina?

4 Og teir sum stóðu hjá søgdu, Deilirt tú høvuðsprest Guðs?

5 Tá segði Paulus, Eg vitsti ikki, brøður, at hann var høvuðsprestur: tí at skrivað stendur, Tú skalt ikki tala ilt um stjórnara fólks tíns.

6 Men tá ið Paulus varnaðist, at tann ēini parturin vóru Săd-dû-cēē´-arar, og hīn Pharisēarar, rópaði hann út í ráðinum, Menn *og* brøður, eg eri ein Pharisēari, sonurin hjá einum Pharisēara: um vónina og uppreisn*ina* av teimum deyðu eri eg kallaður í forhoyr.

7 Og tá ið hann so hevði sagt, reis tað *upp* ein tvídráttur ímillum Pharisēararnar og Săd-dû-cēē´-ararnar: og fjøldin varð sundurdeild.

8 Tí at Săd-dû-cēē´-ararnir siga, at til er eingin uppreisn, eiheldur eingil, ella andi: men Pharisēararnir játta bæði.

9 Og tað reis eitt mikið róp: og teir skriftlærdu, *sum vóru* í parti Pharisēaranna, risu, og stríddu, sigandi, Vit finna einkið ilt í hesum manninum: men um ein andi ella ein eingil hevur talað til hansara, latum okkum ikki berjast ímóti Guði.

10 Og tá ið tað reis ein mikil tvídráttur, fremsti herovastin, óttandi *fyri,* bara ikki Paulus skuldi havt vorðið togaður í stykkir av teimum, beyð hermonnunum at

fara oman, og at taka hann við valdi frá teirra millum, og at føra *hann* inn í borgina.

11 Og ta fylgjandi náttina stóð Harrin hjá honum, og segði, Ver við gott treyst, Paulus: tí at eins og tú hevurt vitnað um meg í Jerusalem, soleiðis mást tú bera vitnisburð eisini í Róm.

12 Og tá ið tað varð dagur, gingu ávísir av Jødunum saman í lið, og bundu seg sjálvar undir eina bølbiðjing, sigandi at teir vildu hvørki eta ella drekka, til teir høvdu dripið Paulus.

13 Og teir vóru fleiri enn fjøruti, sum høvdu gjørt hesa samansvørjingina.

14 Og teir komu til hinar fremstu prestarnar og elstu, og søgdu, Vit hava bundið okkum sjálvar undir eina mikla bølbiðjing, at vit vilja einkið eta, inntil vit hava vigið Paulus.

15 Nú tessvegna, tit, saman við ráðinum, gevið til kennar fyri tí fremsta herovastanum, at hann føri hann oman til tykkara í morgin, sum um tit vildu fregnað okkurt meiri fullkomiliga viðvíkjandi honum: og vit, áður *enn* nakrantíð hann komi nær, eru tilreiðar at drepa hann.

16 Og tá ið systirsonur Paulusar hoyrdi um teirra liggjan á lúri, fór hann og gekk inn í borgina, og segði Paulusi *frá*.

17 Tá kallaði Paulus ēin av hundraðsovastunum at *sær*, og segði, Før henda unga mannin til hin fremsta herovastan: tí at hann hevur eitt ávíst ting at siga honum.

18 So hann tók hann, og førdi *hann* til hin fremsta herovastan, og segði, Fangin Paulus kallaði meg at *sær*, og bað meg at føra henda unga mann til tín, sum hevur okkurt at siga tær.

19 Herovastin tá tók í hondina á honum, og fór *við honum* til viks ēinsæris, og spurdi *hann*, Hvat er tað tú hevurt at siga mær?

20 Og hann segði, Jødarnir hava samst *um* at biðja teg, at tú vildirt ført oman Paulus í morgin í ráðið, sum um teir vildu fregnað okkurt av honum meiri fullkomiliga.

21 Men gev tú ikki eftir fyri teimum: tí at tað liggja á lúri eftir honum av teimum fleiri enn fjøruti menn, sum hava bundið seg sjálvar við einum eiði, at teir vilja hvørki eta ella drekka, til teir hava dripið hann: og nú eru teir tilreiðar, væntandi eftir einum lyfti frá tær.

22 So hin fremsti herovastin læt *tá* hin unga mannin fara avstað, og álegði *honum, Siggj til at tú* sigi ongum manni, at tú hevurt sýnt hesi ting fyri mær.

23 Og hann kallaði til *sín* tveir hundraðsovastar, sigandi, Gerið tilreiðar tvey hundrað hermenn at fara til Çæ-sâ-rē´-ă, og hestmenn trísinstjúgu og tíggju, og spjótmenn tvey hundrað, við hin triðja tíma náttarinnar;

24 Og útvegið *teimum* djór˘, at teir mega seta Paulus á, og føra *hann* tryggan til Felix landsstjóra.

25 Og hann skrivaði eitt bræv eftir hesum háttarlagi:

26 Claudius Lýs´-ĭ-ăs til hins mest mæta landsstjóra Felix *sendir* kvøðu.

27 Hesin maðurin varð tikin av Jødunum, og skuldi havt verðið dripin av teimum: tá kom eg við einum heri, og bjargaði honum, havandi skilt at hann var ein Rómverji.

28 Og tá ið eg vildi havt vitað grundina *fyri* hvørsvegna teir ákærdu hann, førdi eg hann fram í ráð teirra:

29 Hvønn eg varnaðist at vera ákærdan um spurningar um teirra lóg, men at hava einkið lagt til sína ákæru, verdugt til deyða ella til bond.

30 Og tá ið tað varð sagt mær hvussu ið Jødarnir lógu *á* lúri eftir manninum, sendi eg beinanvegin til tín, og gav ábjóðing til hans ákærarar eisini at siga frammi fyri tær hvat *teir høvdu* ímóti honum. Farvæl.

31 Hermenninir, eins og tað varð ábjóðað teimum, tá tóku Paulus, og førdu *hann* um nátt*ina* til Ăn-tĭ-pă´-trĭs.

32 Um morgunin yvirlótu teir reiðmenninar til at fara við honum, og vendu aftur til slottið:

33 Hvørjir, tá ið teir komu til Çæ-sâ-rē´-ŭ, og avhendu epistilin til landsstjóran, stillaðu fram Paulus eisini frammi fyri honum.

34 Og tá ið landsstjórin hevði lisið *brævið,* spurdi hann úr hvørjum ríkisparti hann var. Og tá ið hann skilti at *hann var* úr Çĭ-lĭ´-çĭ-ŭ;

35 Eg vil hoyra teg, segði hann, tá tínir ákærarar eisini eru komnir. Og hann skipaði hann at verða hildnan í dómshøll Hĕ-ró´-dĕs-ar.

KAPITUL 24

OG eftir fimm dagar steig høvuðspresturin Ăn-ă-nĭ´-ăs oman við hinum elstu, og *við* einum ávísum røðumanni, *nevndum* Tĕr´-tŭl-lŭs-i, sum upplýstu landsstjóran ímóti Paulusi.

2 Og tá ið hann varð kallaður fram, byrjaði Tĕr´-tŭl-lŭs at ákæra *hann,* sigandi, Við tað at við^ tær vit njóta mikla stillsemi, og at sera verdigar gerðir verða gjørdar hesi tjóð við^ tíni forsjón,

3 Taka vit ímóti *tí* altíð, og á øllum støðum, mest ediligi Felix, við allari takksemi.

4 Hóast hetta, at eg verði ikki longur troyttiligur hjá tær, biði eg teg at tú vildirt hoyrt okkum av tíni miskunnsemi nøkur fá orð.

5 Tí at vit hava funnið henda mann *vera ein* pestsligan *felaga,* og ein tilskundara av uppreistri millum allar Jødarnar út gjøgnum heimin, og ein liðskipara av sekt Nazarēaranna:

6 Hvør eisini hevur fingist við at vanhalga templið: hvønn vit tóku, og vildu havt dømt samsvarandi við lóg okkara.

7 Men hin fremsti herovastin Lýs´-ĭ-ăs kom *uppá okkum,* og við miklum harðskapi tók *hann* burt út úr hondum okkara,

8 Skipandi hans ákærarum at koma til sín: við rannsókn av hvørjum tú sjálvur kanst nema kunnleika um øll hesi ting, hvarum vit ákæra hann.

9 Og Jødarnir eisini samtyktu, sigandi, at hesi ting vóru so.

10 Paulus, eftir at landsstjórin hevði gjørt tekin til hansara at tala, tá svaraði, Við tað at eg veit at tú hevurt verið um mong ár ein dómari hjá hesi tjóð, svari eg tess meira fegnisliga fyri mær sjálvum:

11 Av tí at tú kanst skilja, at tað eru enn bert tólv dagar síðan eg fór niðan til Jerusalem fyri at tilbiðja.

12 Og teir hvørki funnu meg í templinum skiftandi orð við nakran mann, eiheldur reisandi upp fólkið, hvørki í sýnagogunum, ella í staðinum:

13 Eiheldur kunnu teir prógva teir lutir, um hvørjar teir nú ákæra meg.

14 Men hetta játti eg tær, at eftir veginum sum teir kalla ranglæra, soleiðis tilbiði eg Guð fedra mína, trúgvandi øllum tingum sum eru skrivaði í lógini og í prophetunum:

15 Og havi vón mótvegis Guði, sum teir sjálvir eisini viðurkenna, at tað skal verða ein uppreisn av teimum deyðu, bæði av teimum rættvísu og órættvísu.

16 Og herí venji eg meg sjálvan altíð at hava eina samvitsku – tóma fyri meinboga mótvegis Guði, og *mótvegis* monnum.

17 Nú, eftir mong ár kom eg

at bera olmussur til tjóð mína, og ofringar.

18 Við hvat ávísir Jødar úr Asiu funnu meg skírgaðan í templinum, hvørki við mannfjøld, ella við ófriði.

19 Hvørjir áttu at havt verið her frammi fyri tær, og mótmælt, um teir høvdu okkurt ímóti mær.

20 Ella annars lat hesar somu *her* siga, um teir hava funnið nakra illgerð í mær, meðan eg stóð frammi fyri ráðinum,

21 Uttan tað veri fyri hesa ēinu rødd sum eg rópti, standandi teirra millum, Viðvíkjandi uppreisn teirra deyðu eri eg kallaður í forhoyr av tykkum henda dag.

22 Og tá ið Felix hoyrdi hesi ting, havandi meiri fullkomnan kunnleika um *tann* vegin, útsetti hann teir, og segði, Tá ið Lýs′-ĭ-ăs, fremsti herovastin, skal koma oman, vil eg vita hitt evsta um tykkara mál.

23 Og hann beyð einum hundraðsovasta at varða Paulus, og at lata *hann* fáa sømdir, og at hann skuldi nokta ongum av hansara kennskapi at tæna ella koma til hansara.

24 Og eftir ávísar dagar, tá ið Felix kom við konu síni Drû-sĭl′-lŭ, sum var ein Jødinna, sendi hann eftir Paulusi, og hoyrdi hann viðvíkjandi trúnni á Christ.

25 Og sum hann røddi um rættvísi, fráhaldni, og komandi dóm, nøtraði Felix, og svaraði, Far tín veg fyri hesa ferð; tá ið eg havi eina lagaliga tíð, vil eg kalla teg.

26 Hann vónaði eisini at peningur skuldi havt verðið givin honum av Paulusi, at hann mátti loysa hann: av hvørji grund hann sendi eftir honum tess oftari, og samtalaði við hann.

27 Men eftir tvey ár kom Pŏr′-cĭ-ŭs Festus í rúm Felixar: og Felix, villigur at sýna Jødunum eina fragd, eftirlæt Paulus bundnan.

KAPITUL 25

NÚ, tá ið Festus var komin inn í ríkispartin, eftir tríggjar dagar steig hann niðan frá Çæ-sâ-rē′-ŭ til Jerusalem.

2 Tá kunnaðu høvuðspresturin og teir fremstu av Jødunum hann ímóti Paulusi, og bønaðu hann,

3 Og tráaðu góðvild ímóti honum, at hann vildi senda eftir honum til Jerusalem, liggjandi *á* lúri á veginum at drepa hann.

4 Men Festus svaraði, at Paulus skuldi verða hildin í Çæ-sâ-rē′-ŭ, og at sjálvur hann vildi fara avstað fljótliga *hagar*.

5 Latið teir tessvegna, segði hann, sum tykkara millum eru førir, fara oman við *mær*, og ákæra henda mann, um tað veri nøkur vondska í honum.

6 Og tá ið hann hevði dvalt teirra millum meira enn tíggju dagar, fór hann oman til Çæ-sâ-rē′-ŭ; og hin næsta dagin, sitandi á dómstólinum, skipaði Paulus at verða fingnan.

7 Og tá ið hann var komin, stóðu Jødarnir, sum vóru komnir oman frá Jerusalem, rundanum, og løgdu mangar og herviligar klagur ímóti Paulusi, sum teir kundu ikki prógva.

8 Meðan hann svaraði fyri seg, Hvørki ímóti lógini hjá Jødunum, ella ímóti templinum, ella tá ímóti Çæsar, havi eg misbrotist nakað ting yvirhøvur.

9 Men Festus, villigur at gera Jødunum eina fragd, svaraði Paulusi, og segði, Vilt tú fara niðan til Jerusalem, og har verða dømdur í hesum tingunum frammi fyri mær?

10 Tá segði Paulus, Eg standi við dómstól Çæsars, har eg átti at verðið dømdur: móti Jødunum havi eg einkið skeivt gjørt, sum tú sera væl veitst.

11 Tí at um eg veri *meg* ein

misbrótari, ella havi framt nakað deyða vert, *so* nokti eg ikki at doyggja: men um tað veri eingi av hesum tingunum, hvarum hesir ákæra meg, *so* kann eingin maður geva meg yvir til teirra. Eg skjóti *málið* fyri Çæsar.

12 Festus, tá ið hann hevði samráðst við ráðið, tá svaraði, Hevurt tú skotið *málið* fyri Çæsar? til Çæsars skalt tú fara.

13 Og eftir ávísar dagar komu Agrippa kongur og Bër-nï´-çë til Çæ-sâ-rë´-ŭ at heilsa *uppá* Festus.

14 Og tá ið tey høvdu verið har *í* mangar dagar, klárlegði Festus søkina hjá Paulusi fyri kongi, sigandi, Tað er ein ávísur maður, eftirlatin í bondum av Felixi:

15 Um hvønn, tá ið eg var í Jerusalem, teir fremstu prestarnir og hinir elstu av Jødunum upplýstu *meg,* tráandi *at fáa* dóm ímóti honum.

16 Til hvørja eg svaraði, Tað er ikki háttarlagið hjá Rómverjunum at geva nakran mann yvir til at doyggja, áðrenn ið hann, sum er ákærdur, havi ákærararnar andlit til andlits, og havi loyvi at svara fyri sær viðvíkjandi brotsgerðini, lagdari ímóti sær.

17 Tessvegna, tá ið teir vóru komnir higar, uttan nakað drál um morgunin settist eg á dómstólin, og skipaði mannin at verða fingnan fram.

18 Ímóti hvørjum, tá ið ákærararnir stóðu upp, teir komu við ongari ákæru um slíkar lutir sum eg helt:

19 Men høvdu ávísar spurningar ímóti honum um teirra egnu pátrúgv, og um ēin Jesus, sum var deyður, hvønn Paulus váttaði at vera livandi.

20 Og av tí at eg ivaðist um tesshættar spurningar, spurdi eg *hann* hvørt hann vildi fara til Jerusalem, og har verða dømdur um hesi mál.

21 Men tá ið Paulus hevði skotið inn at verða goymdur at hoyringini av Augustusi, beyð eg hann at verða varðaðan, til eg mátti sent hann til Çæsars.

22 Tá segði Agrippa við Festus, Eg vildi eisini hoyrt mannin sjálvur. Í morgin, segði hann, skalt tú hoyra hann.

23 Og um morgunin, tá ið Agrippa var komin, og Bër-nï´-çë, við miklum skrúð, og var farin inn í hoyringarstaðið, við hinum fremstu herovastunum, og aðal monnum staðarins, við boðið hjá Festusi varð Paulus fingin fram.

24 Og Festus segði, Agrippa kongur, og allir menn sum her eru hjástaddir hjá okkum, tit síggja henda mann, um hvønn øll fjøldin av Jødunum hevur fingist við meg, bæði í Jerusalem, og *eisini* her, rópandi at hann átti ikki at livað longur.

25 Men tá ið eg fann at hann hevði framt einkið deyða vert, og at hann hevði sjálvur skotið *málið* fyri Augustus, havi eg avrátt at senda hann.

26 Um hvønn eg havi einkið ávíst ting at skriva harra mínum. Hvørsvegna eg havi ført hann fram fyri tykkum, og serstakliga framfyri teg, O Agrippa kong, *fyri* at, eftir hildna rannsókn, eg mátti hava eitthvørt at skriva.

27 Tí at tað tykir mær órímiligt at senda ein fanga, og ikki *saman* við at uppmála brotsgerðirnar, *lagdar* ímóti honum.

KAPITUL 26

TÁ segði Agrippa við Paulus, Tær er loyvt at tala fyri teg. Paulus tá rætti fram hondina, og svaraði fyri seg:

2 Eg haldi meg glaðan, Agrippa kongur, av tí at eg skal svara fyri meg henda dag frammi fyri tær viðvíkjandi øllum teimum tingum, hvarum eg eri ákærdur av Jødunum:

3 Serstakliga *av tí at eg veit* teg at vera serkønan í øllum skikkum og spurningum sum eru Jødanna millum: hvørsvegna eg bøni teg at hoyra meg tolmóðiga.

4 Mítt lívsháttarlag frá mínum ungdómi, sum var í fyrstani egnu tjóðar mínar millum í Jerusalem, kenna allir Jødarnir;

5 Hvørjir kendu meg frá byrjanini, um teir vildu vitnað, at eftir hini mest strangastu sekt trúar várar livdi eg *sum* ein Pharisēari.

6 Og nú standi eg og verði dømdur fyri vónina um fyrijáttanina, gjørd fedrum várum av Guði:

7 At hvørji *fyrijáttan* okkara tólv ættir, staðiliga tænandi *Guði* dag og nátt, vóna at koma. Hvørs vónar vegna, Agrippa kongur, eg verði ákærdur av Jødunum.

8 Hví skuldi tað verðið hildið eitt ting ótrúligt hjá tykkum, at Guð skuldi reist tey deyðu?

9 Eg sanniliga hugsaði við mær sjálvum, at eg átti at gera mong ting andstøðis navni Jesu úr Nazareth.

10 Hvat ting eg eisini gjørdi í Jerusalem: og mong av teimum heilagu lokaði eg inni í fongsul, havandi móttikið myndugleika frá teimum fremstu prestunum; og tá ið tey vórðu tikin av lívi, gav eg mína rødd ímót *teimum*.

11 Og eg revsaði tey ofta í hvørji sýnagogu, og noyddi *tey* at Guðsspotta; og verandi ovurhondsliga óður inná tey, søkti eg at *teimum* enntá at fremmandum staðum.

12 Við hvat, sum eg fór til Damascus við myndugleika og umboði frá fremstu prestunum,

13 Við middag, Ó kongur, sá eg á vegnum eitt ljós frá himni, omanfyri bjartleika sólarinnar, skínandi runt um meg og teir sum ferðaðust við mær.

14 Og tá ið vit vóru allir falnir til jarðarinnar, hoyrdi eg eina rødd, talandi við meg, og sigandi á hini Hebrāisku tungu, Saul, Saul, hví søkirt tú at mær? *tað er* torført hjá tær at sparka ímóti broddunum.

15 Og eg segði, Hvør ert tú, Harri? Og hann segði, Eg eri Jesus, hvørjum tú søkirt at.

16 Men rís *upp,* og statt uppá tínar føtur: tí eg havi birtst tær fyri hesa tilætlan, at gera teg *til* ein tænara og eitt vitni bæði um hesi tingini sum tú hevurt sæð, og um tey tingini, í hvørjum eg vil birtast tær;

17 Útfríandi teg frá fólkinum, og *frá* Heidningunum, til hvørja nú eg sendi teg,

18 At upplata eygu teirra, *og* at venda *teimum* frá myrkri til ljóss, og *frá* valdi Satans at Guði, at teir mega móttaka fyrigeving av syndum, og arv millum teirra sum eru halgaðir við` trúgv sum er á meg.

19 Við hvat, O Agrippa kongur, eg var ikki ólýðin hini himinsku sjón:

20 Men sýndi fyrst teimum úr Damascus, og í Jerusalem, og út gjøgnum øll umráðini av Judæu, og *síðan* fyri Heidningunum, at teir skuldu venda um og venda til Guðs, og gera verk, hóskilig fyri umvending.

21 Av hesum grundum fangaðu Jødarnir meg í templinum, og lógu úti eftir at drepa *meg*.

22 Havandi tí vunnið hjálp av Guði, haldi eg áfram at hesum degi, vitnandi bæði fyri smáum og miklum, sigandi eingi onnur ting enn tey sum prophetarnir og Móses siga skuldu koma:

23 At Christus skuldi líða, *og* at hann skuldi vera hin fyrsti sum skuldi rísa frá teimum deyðu, og skuldi sýna fólkinum ljós, og fyri Heidningunum.

24 Og sum hann soleiðis talaði fyri seg, segði Festus við harð-

ari rødd, Paulus, tú ert frá tær sjálvum; mikil lærdómur ger teg óðan.

25 Men hann segði, Eg eri ikki óður, mest ediligi Festus; men tali fram orðini av sannleika og edrúiligleika.

26 Tí at kongur veit um hesi tingini, frammi fyri hvørjum eg eisini tali frítt: tí at eg eri sannførdur *um,* at eingi av hesum tingunum eru fjald fyri honum; tí at hetta tingið varð ikki gjørt í einum *út*horni.

27 Agrippa kongur, trýrt tú prophetunum? Eg veit at tú trýrt.

28 Tá segði Agrippa við Paulus, Næstan tú yvirtalart meg til at verða ein Christin.

29 Og Paulus segði, Eg vildi til Guðs at ikki einans tú, men eisini øll sum hoyra meg henda dag, vóru bæði næstan, og aldeilis slík sum eg eri, hesi bond undantikin.

30 Og tá ið hann svá hevði talað, reis upp kongur, og landsstjórin, og Bĕr-nī´-çē, og tey sum sótu við teimum:

31 Og tá ið tey vóru farin til síðis, talaðu tey sín ámillum, sigandi, Hesin maðurin ger einkið vert deyða ella bond.

32 Tá segði Agrippa við Festus, Hesin maðurin mátti havt verðið settur í frælsi, um hann hevði ikki skotið *málið* fyri Çæsar.

KAPITUL 27

OG tá ið tað var avrátt at vit skuldu sigla inn í Italiu, lótu teir Paulus og ávísar aðrar fangar at *ēinum,* nevndum Juliusi, einum hundraðsovasta av liði Augustusar.

2 Og, farandi inn í eitt skip úr Ăd-ră-mýt´-tī-ŭm, løgdu vit út, ætlandi at sigla framvið Asiu strondunum; *ēin* Ar-ĭs´-târ-chŭs, ein Măc-ĕ-dō´-nī-ari úr Thĕss-ă-lō´-nī-cŭ, verandi við okkum.

3 Og tann næsta *dagin* komu vit at í Sī´-dŏn. Og Julius kurteisligani fór við Paulusi, og gav *honum* náðir at fara til vinir sínar at endurfríska seg.

4 Og tá ið vit høvdu lagt út haðani frá, sigldu vit undir Cýpros, av tí at vindarnir vóru andstøðis.

5 Og tá ið vit høvdu siglt yvir Çĭ-lĭ´-çĭ-ŭ og Păm-phý´-lĭ-ŭ havið, komu vit til Mý´-rū, *ein stað* av Lýç´-ĭ-ŭ.

6 Og har fann hundraðsovastin eitt skip úr Alexandriu, siglandi inn í Italiu; og hann setti okkum hará.

7 Og tá ið vit høvdu siglt spakuliga mangar dagar, og nóg illa vóru komnir yvirav Cnī´-dŭs, vindurin ikki loyvandi okkum, sigldu vit undir Cretoy, áraka Săl-mō´-nĕ;

8 Og treyðugliga farandi framvið henni, komu at einum plássi sum kallast Tær føgru havnirnar; nær hvørjum var staðurin Lă-sē´-ă.

9 Nú, tá ið nógv tíð var brúkt, og tá ið sigling var nú vandasom, av tí at føstan var nú longu liðin, formanaði Paulus *teir,*

10 Og segði við teir, Harrar, eg varnist at henda sjóferð verður við skaða og miklari oyðilegging, ikki einans fyri farmin og skipið, men eisini fyri lívini hjá okkum.

11 Hóast hetta, hundraðsovastin trúði stýrimanninum og eigaranum av skipinum, meir enn teim tingunum sum vórðu talaði av Paulusi.

12 Og av tí at havnin var ikki høglig at vetra í, ráddi meirilutin til at fara avstað haðani eisini, um við nøkrum brøgdum teir máttu nátt til Phø-nī´-çĭ-ŭ, *og har* at vetrað; *sum er* ein havn av Cretoy, og liggur ímóti útsynningi og útnyrðingi.

13 Og tá ið sunnanvindurin blásti makliga, haldandi at teir

høvdu uppnátt *síni* ætlan, loysandi *haðani,* sigldu teir tætt við Cretoy.

14 Men ikki leingi aftaná reis tað ímóti henni ein ódnarligur vindur, kallaður Ēv-rô-clȳ´-dŏn.

15 Og tá ið skipið varð fangað, og kundi ikki liggja upp ímóti vindinum, lótu vit *hana* reka.

16 Og, rennandi undir eina ávísa oyggj, sum kallast Claudia, høvdu vit mikið arbeiði at koma bátinum fyri:

17 Hvønn, tá ið teir høvdu tikið upp, brúktu teir hjálpar*midlar,* undirgyrðandi skipið; og óttandi *fyri,* bara ikki teir skuldu fallið inn í kyksendini, strikaðu segl, og so vórðu riknir.

18 Og vit, verðandi ovurhondsligani syftir av einum ódnarvindi, tann næsta *dagin* lættu teir skipið;

19 Og hin triðja *dagin* kastaðu vit út við okkara egnu hondum skipsgreiðurnar.

20 Og tá ið hvørki sól ella stjørnur í mangar dagar birtust, og eingin smávegis ódnarvindur lá á *okkum,* var øll vón *um* at vit skuldu verða bjargaðir tá tikin burtur.

21 Men eftir langt fráhald steig Paulus fram í teirra mittu, og segði, Harrar, tit skuldu havt lýtt á meg, og ikki havt loyst frá Cretoy, og at havt spart henda løst og miss.

22 Og nú formani eg tykkum at vera við gott treyst: tí at tað skal eingin missur verða av lívi *nakars mans* tykkara millum, uttan av skipinum.

23 Tí at tað stóð hjá mær hesa nátt eingil Guðs, hvørs eg eri, og hvørjum eg tæni,

24 Sigandi, Óttast ikki, Paulus; tú mást verða førdur framfyri Cæsar: og sí, Guð hevur givið tær allar teir sum sigla við tær.

25 Hvørsvegna, harrar, verið við gott treyst: tí at eg trúgvi Guði, at tað skal verða enntá sum tað varð sagt mær.

26 Hvussu enn er, vit mugu verða kastaðir uppá eina ávísa oyggj.

27 Men tá ið hin fjúrtanda náttin var komin, sum vit vórðu riknir niðan og oman í Ā´-drĭ-ŭ, um midnátt mettu skipsmenninir, at teir nærkaðust onkrum landi;

28 Og skattaðu, og funnu *tað* tjúgu favnar: og tá ið teir vóru farnir eitt sindur longur, skattaðu teir aftur, og funnu *tað* fimtan favnar.

29 Síðan, óttandi *fyri,* bara ikki vit skuldu havt fallið uppá sker, kastaðu teir fýra akker út úr hekkuni, og ynsktu eftir deginum.

30 Og sum skipsmenninir vóru um at flýggja út úr skipinum, tá ið teir høvdu lorað niður bátin í sjógvin, undir skini sum um teir vildu havt kastað akker˘ út úr stevninum,

31 Segði Paulus til hundraðsovastan og til hermenninar, Uttan *at* hesir verði *verandi* í skipinum, kunnu tit ikki verða bjargaðir.

32 Hermenninir tá skóru av togini á bátinum, og lótu hann detta av.

33 Og meðan dagurin var komandi á, bønaði Paulus *teir* allar at fáa *sær* mat, sigandi, Hesin dagur er hin fjúrtandi dagurin sum tit hava bíðað og hildið áfram fastandi, havandi einkið fingið *tykkum.*

34 Hvørsvegna eg biði tykkum at fáa *tykkum nakað av* mati: tí at hetta er fyri tykkara heilsu: tí at tað skal ikki eitt hár falla frá høvdinum á nøkrum av tykkum.

35 Og tá ið hann svá hevði talað, tók hann breyð, og veitti tøkkir til Guðs í nærveruni av teim øllum: og tá ið hann hevði brotið *tað,* byrjaði hann at eta.

36 Tá vórðu teir allir við gott

lag, og teir eisini fingu *sær nakað av* mati.

37 Og vit vóru í alt í skipinum tvey hundrað *og* trísinstjúgu og sekstan sálir.

38 Og tá ið teir høvdu etið nóg mikið, lættu teir skipið, og kastaðu út hveitið inn í sjógvin.

39 Og tá ið tað varð dagur, kendu teir ikki landið: men teir varnaðust eina ávísa vík við eini strond, inn í hvørja teir vóru hugaðir, um tað var gjørligt, at stoyta skipið inn *í*.

40 Og tá ið teir høvdu tikið upp akkerini, litu teir *seg* upp til havsins, og loystu róðurbondini, og heysaðu upp stórseglið fyri vindinum, og hildu ímóti strondini.

41 Og, fallandi inn í eitt stað har tveir sjógvar møttust, rendu teir skipið á land; og framparturin stakk fastur, og varð verandi óvikiligur, men tann aftari parturin varð brotin við harðleikanum av aldunum.

42 Og ráðið hjá hermonnunum var at drepa fangarnar, bara ikki nakar av teimum skuldi svomið út, og komist undan.

43 Men hundraðsovastin, villigur at bjarga Paulusi, helt teir frá *teirra* ráðagerð; og skipaði at teir, sum dugdu *at* svimja, skuldu kasta *seg* fyrstar *í sjógvin,* og sleppa *sær* til lands:

44 Og restin, summir á plonkum, og summir á *brotnum stykkjum* av skipinum. Og soleiðis bar tað á, at teir komust undan allir tryggir til lands.

KAPITUL 28

OG tá ið teir høvdu komist undan, tá vitstu teir, at oyggin kallaðist Mê-lĭ´-tă.

2 Og tað barbáriska fólkið sýndi okkum ongan smávegis blíðskap: tí at tey kyndu ein eld, og tóku ímóti okkum hvørjum ēin*støkum,* orsakað av núverandi regninum, og orsakað av kuldanum.

3 Og tá ið Paulus hevði savnað eitt bundi av greinum, og lagt *tær* á eldin, kom tað ein eiturormur út úr hitanum, og festist á hond hansara.

4 Og tá barbárarnir sóu hitt *eitursama* djórið hanga á hond hansara, søgdu teir sín ámillum, Eingin ivi er hesin maðurin ein myrðari, hvørjum, hóast hann hevur komist undan sjónum, tó hevndin loyvir ikki at liva.

5 Og hann risti av djórið inn í eldin, og merkti einkið mein.

6 Hvussu enn er, teir hugdu nær hann skuldi havt hovnað, ella dottið niður deyður brádliga: men eftir *at* teir høvdu hugt eina langa stund, og sóu einkið mein koma til hansara, broyttu teir sína meining, og søgdu at hann var ein gudur.

7 Í teimum somu umráðunum vóru ognir hjá hægsta manninum á oynni, hvørs navn var Publius; sum tók ímóti okkum, og hýsti okkum tríggjar dagar kurteisliga.

8 Og tað bar á, at faðir Publiusar lá sjúkur av hitasótt og blóðgangi: til hvørs Paulus fór inn, og bað, og legði hendur sínar á hann, og grøddi hann.

9 So tá ið hetta var gjørt, onnur eisini, sum høvdu sjúkdómar á oynni, komu og vórðu grødd:

10 Hvørji eisini heiðraðu okkum við mongum heiðurum; og tá ið vit fóru avstað, løddu tey *okkum* við slíkum tingum sum vóru neyðug.

11 Og eftir tríggjar mánaðir fóru vit avstað í einum skipi úr Alexandriu, sum hevði vetrað á oynni, hvørs merki var Castor og Pollux.

12 Og, *leggjandi* at landi í Sýrâ-cū´-sê, steðgaðu vit *har í* tríggjar dagar.

13 Og haðani frá heintaðu vit eina kringferð, og komu til

Rhē´-gī-ŭm: og eftir ēin dag blásti sunnanvindurin, og vit komu hin næsta dagin til Pû-tê-ō´-lī:

14 Har vit funnu brøður, og vórðu tráaðir at steðga hjá teimum sjey dagar: og so fóru vit ímóti Róm.

15 Og haðani frá, tá ið brøðurnir hoyrdu um okkum, komu teir at møta okkum so langt sum *at* Ăp´-pī-ī fōr´-ŭm, og Teimum trimum kráunum: hvørjar, tá ið Paulus sá, hann takkaði Guði, og tók mót *til sín*.

16 Og tá ið vit komu til Róm, fekk hundraðsovastin lívvarðarovastanum fangarnar: men Paulusi varð loyvt at dvøljast fyri seg sjálvan við einum hermanni sum vaktaði hann.

17 Og tað bar á, at aftaná tríggjar dagar kallaði Paulus teir fremstu av Jødunum saman: og tá ið teir vóru komnir saman, segði hann við teir, Menn *og* brøður, hóast eg havi einkið framt ímóti fólkinum, ella venjunum hjá fedrum várum, tó varð eg latin fangi frá Jerusalem inn í hendurnar á Rómverjunum.

18 Hvørjir, tá teir høvdu rannsakað meg, vildu havt latið *meg* farið, av tí at tað var eingin grund til deyða í mær.

19 Men tá ið Jødarnir talaðu ímóti *tí,* varð eg noyddur at skjóta *málið* fyri Çæsar; ikki *tað* at eg hevði okkurt at ákæra tjóð mína fyri.

20 Av hesi grund, tessvegna, havi eg kallað tykkum, at síggja *tykkum,* og at tala við *tykkum:* av tí at vegna vón Ísraels eri eg bundin við hesi leinkju.

21 Og teir søgdu við hann, Vit hvørki fingu brøv úr Judæu viðvíkjandi tær, eiheldur sýndu ella talaðu nakrir av brøðrunum, sum komu, nakað mein um teg.

22 Men vit tráa at hoyra frá tær hvat tú hugsart: tí at hvat hesi sekt viðvíkur, vit vita at allastaðni verður hon talað ímóti.

23 Og tá ið teir høvdu útnevnt honum ein dag, komu tað mangir til hansara inn í *hansara* tilhald; fyri hvørjum hann útlegði og vitnaði kongadømi Guðs, sannførandi teir viðvíkjandi Jesusi, bæði út frá Móselógini, og *út frá* prophetunum, frá morgni til kvølds.

24 Og summir trúðu teim tingunum sum vórðu talaði, og summir trúðu ikki.

25 Og tá ið teir samdust ikki sín ámillum, fóru teir avstað, eftir at Paulus hevði talað ēitt orð, Væl talaði Halgi Andin við Ê-sâ´-ăs-i prophēti til fedra vára,

26 Sigandi, Far til hesa fólks, og sig, Hoyrandi skulu tit hoyra, og skulu ikki skilja; og síggjandi skulu tit síggja, og ikki fata:

27 Tí at hjartað á hesum fólki er vaksið døls kt, og teirra oyru eru dul at hoyra, og síni eygu hava tey latið aftur; at ikki tey skuldu síggja við eygum *sínum,* og hoyra við oyrum *sínum,* og skilja við hjarta *sínum,* og skuldu verðið umvend, og eg skuldi grøtt tey.

28 Veri tað kunnugt tykkum, tessvegna, at Guðs frelsa er send Heidningunum, og *at* teir vilja hoyra hana.

29 Og tá ið hann hevði sagt hesi orð, fóru Jødarnir avstað, og høvdu mikla umráðing sín ámillum.

30 Og Paulus dvaldist tvey samfull ár í sínum egna leigaða húsi, og tók ímóti øllum sum komu inn til hansara,

31 Prædikandi kongadømi Guðs, og frálærandi tingini sum viðvíkja Harranum Jesusi Christi, við øllum frímóði, eingin maður sýtandi honum.

EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS
TIL
RÓMVERJANNA.

KAPITUL 1

PAULUS, ein tænari Jesu Christs, kallaður *at vera* ein ápostul, tilskilaður gleðiboðskapi Guðs,

2 (Hvønn hann frammanundan hevði lovað við^ prophetum sínum í hinum heilagu skriftum,)

3 Viðvíkjandi Syni sínum Jesusi Christi Harra várum, sum varð gjørdur av sáði Dávids samsvarandi við kjøtið;

4 Og yvirlýstur *at vera* Sonur Guðs við kraft, samsvarandi við anda heilagleikans, við^ uppreisnini frá teimum deyðu:

5 Við^ hvørjum[P] vit hava móttikið náði og ápostladømi, til lýdnis mót trúnni millum alra tjóða, fyri navn hansara:

6 Hvørja millum eru tit eisini hinir kallaðu Jesu Christs:

7 Til alra sum veri í Róm, Guðs háttelskaðu, kallaðir *til tess at vera* heilagir: Náði til tykkara og friður frá Guði Faðir várum, og Harranum Jesusi Christi.

8 Fyrst takki eg Guði mínum gjøgnum Jesus Christ fyri tykkum allar, at tykkara trúgv er talað um út um allan heimin.

9 Tí at Guð er mítt vitni, hvørjum eg tæni við anda mínum í gleðiboðskapi Sonar hansara, at uttan íhald eg nevni tykkum altíð í bønum mínum;

10 Gerandi umbøn, um við onkrum háttarlagi nú endiliga eg mátti havt eina framgangsríka ferð við vilja Guðs at komið til tykkara.

11 Tí mær leingist at siggja tykkum, at eg má tilluta tykkum onkra andliga gávu, til tess endamáls *at* tit mega verða grundfestir;

12 Tað er, at eg má verða uggaður saman við tykkum av hini felags trúgv, bæði tykkara og míni.

13 Nú, eg vildi ikki havt tykkum óvitandi, brøður, at mangan setti eg mær fyri at koma til tykkara, (men varð forðaður higartil,) at eg mátti hava onkran ávøkst tykkara millum eisini, enntá sum millum annara Heidninga.

14 Eg eri skuldnari bæði til Grikkanna, og til Barbáranna; bæði til hinna vísu, og til hinna óvísu.

15 So *at,* so mikið sum í mær er, eri eg tilreiðar at prædika gleðiboðskapin fyri tykkum sum eru í Róm eisini.

16 Tí at eg skammist ikki við gleðiboðskap Christs: tí at hann er kraft Guðs til frelsu fyri hvønn tann sum trýr; fyri Jødan fyrst, og eisini fyri Grikkan.

17 Tí at harí verður rættvísi Guðs opinberað frá trúgv til trúar: eins og skrivað stendur, Hin rættvísi skal liva við^ trúgv.

18 Tí at vreiði Guðs verður opinberað frá himni ímóti øllum ógudiligleika og órættvísi hjá monnum sum halda sannleikanum í órættvísi;

19 Av tí at tað, sum kann verða vitað um Guð, er eyðsýnt í teimum; tí at Guð hevur sýnt teimum *tað*.

20 Tí at hinir ósjónligu lutir hansara frá skapan veraldarinnar eru klárliga sæddir, verðandi fataðir av teim lutum sum eru gjørdir, *enntá* hansara ævigi máttur og Guðhøvd; so at teir eru uttan umbering:

21 Av tí at, tá ið teir kendu Guð, dýrðmettu teir *hann* ikki sum Guð, eiheldur vóru takksamir; men gjørdust fáfongdir í sínum ímyndanum, og teirra fávitskuta hjarta varð myrkjað.

22 Váttandi seg sjálvar at vera vísar, gjørdust teir dárar,
23 Og broyttu dýrd hins óforgongiliga Guðs yvirí eina mynd, gjørd lík forgongiligum manni, og fuglum, og ferføttum djórum, og skriðkyktum.
24 Hvørsvegna Guð eisini gav teir upp til óreinsku, gjøgnum girndirnar av teirra egnu hjørtum, at vanæra síni egnu likam sín ámillum:
25 Hvørjir broyttu sannleika Guðs yvirí eina lygn, og tilbóðu og tænaðu skapninginum meiri enn Skaparanum, sum er vælsignaður um ævir. Á-měn.
26 Av hesi grund gav Guð teir upp at ringum lystum: tí at sjálvt teirra kvinnur broyttu tað náttúrliga brúkið yvirí hatta sum er ímóti náttúru:
27 Og somuleiðis eisini menninir, farandi frá tí náttúrliga brúkinum av kvinnuni, brendu í síni girnd hvør móti øðrum; menn við monnum virkandi hatta sum er ósømiligt, og móttakandi í sær sjálvum tað viðurlag villu sínar sum var hóskiligt.
28 Og enntá sum teim líkaði ei at afturhalda Guð í kunnleika *sínum,* gav Guð teir yvir til eitt afturkastiligt sinni, at gera hasar lutir sum eru ikki sømiligir;
29 Verandi fyltir við allari órættvísi, siðloysi, vondsku, ágirnd, illviljaskapi; fullir av øvund, morði, trætnaði, sviki, óndskapi; teskarar,
30 Bakbítarar, hatarar av Guði, hatursfullir, hugmóðigir, reyparar, uppfinnarar av illum tingum, foreldrum ólýdnir,
31 Uttan skil, sáttmálabrótarar, uttan náttúrligan alsk, ósemjiligir, ómiskunnsamir:
32 Hvørjir, kennandi dóm Guðs, at teir, sum fremja slíkar lutir, eru verdigir til deyða, ikki einans gera hinar somu, men hava hugnað í teimum sum gera teir.

KAPITUL 2

TÍ ert tú óumberligur, O maður, hvørsumhelst *ið* tú ert sum dømirt: tí at hvarí tú dømirt ein annan, fordømirt tú teg sjálvan; tí at tú, sum dømirt, gert hini somu ting.
2 Men vit eru vísir *í,* at Guðs dómur er samsvarandi við sannleika ímóti teimum sum fremja slíkar lutir.
3 Og hugsart tú hetta, O maður, sum dømirt teir sum gera slíkar lutir, og gert hinar somu, at tú skalt komast undan dómi Guðs?
4 Ella vanvirðirt tú ríkdómarnar av hansara góðsku og yvirberni og langmóði; ei vitandi, at Guðs góðska leiðir teg til umvendingar?
5 Men eftir tínum harðleika og óumvendiliga hjarta goymirt tær sjálvum niðurfyri vreiði ímóti deginum av vreiði og opinbering av rættvísa dómi Guðs;
6 Sum[p] vil rinda til hvønn mann samsvarandi við gerðir hans:
7 Til teirra sum við tolmóðigum áhaldni í vælgering sóknast eftir dýrd og heiðuri og ódeyðiligleika, ævigt lív:
8 Men teimum ið eru tvørlyntir, og lýða ikki sannleikan, men lýða órættvísi, grimd og vreiði,
9 Trongslu og angist, uppá hvørja mannasál sum ger ilt, hjá Jødanum fyrst, og eisini hjá Heidninginum;
10 Men dýrd, heiður, og frið, til hvønn mann sum virkar gott, til Jødan fyrst, og eisini til Heidningin:
11 Tí at tað er eingin metan av persónum hjá Guði.
12 Tí at so mangir sum hava syndað uttan lóg, skulu eisini glatast uttan lóg: og so mangir sum hava syndað í lógini, skulu verða dømdir við lógini;
13 (Tí at ikki hoyrararnir av lógini *eru* rættvísir frammi fyri Guði,

men gerararnir av lógini skulu verða rættvísgjørdir.
14 Tí at tá ið Heidningarnir, sum hava ikki lógina, gera av náttúru tey tingini, innihildin í lógini, hesir, havandi ikki lógina, eru sær sjálvum lóg:
15 Hvørjir sýna verk lógarinnar skrivað í teirra hjørtu, teirra samvitska eisini berandi vitnisburð, og *teirra* hugsanir sín ámillum ákærandi, ella hinvegin umberandi, hvørja aðra;)
16 Á tí degi tá ið Guð skal døma loyndardómar manna við Jesusi Christi, samsvarandi við gleðiboðskap mín.
17 Sí, tú ert kallaður Jødi, og hvílirt í lógini, og gert tína rósan av Guði,
18 Og veitst *hansara* vilja, og viðurkennirt tey tingini sum eru meiri avbær, verðandi undirvístur út frá lógini;
19 Og ert sannførdur *um*, at tú sjálvur ert ein vegleiðari hjá teimum blindu, eitt ljós hjá teimum sum eru í myrkri,
20 Ein undirvísari hjá hinum fávitskutu, ein lærari hjá nýføðingum, sum hevurt sniðið á kunnleika og á sannleikanum í lógini.
21 Tú, tessvegna, sum lærirt ein annan, lærirt tú ikki teg sjálvan? tú, sum prædikart, *at* ein maður skuldi ikki stjolið, stjelurt tú?
22 Tú, sum sigurt, *at* ein maður skuldi ikki framt hordóm, fremurt tú hordóm? tú, sum hevurt andstygd fyri skurðgudum, fremurt tú halgirán?
23 Tú, sum gert tína rósan av lógini, ígjøgnum bróting av lógini vanærirt tú Guð?
24 Tí at navn Guðs verður Guðsspottað Heidninganna millum gjøgn tykkum, eins og skrivað er.
25 Tí at umskering sanniliga gagnar, um tú haldi lógina: men um tú veri ein brótari av lógini, er tín umskering gjørd óumskering.
26 Tessvegna, um óumskeringin haldi rættvísi lógarinnar, skal ikki hans óumskering verða roknað fyri umskering?
27 Og skal ikki óumskering, sum er av náttúru, um hon uppfylli lógina, døma teg, sum við bókstavinum og umskering misbrýturt lógina?
28 Tí at hann er ikki ein Jødi, sum er ēin útvortisliga; eiheldur *er tað* umskering, sum er útvortis í kjøtinum:
29 Men hann *er* ein Jødi, sum er ēin innvortisliga; og umskering *er tann* av hjartanum, í andanum, *og* ikki í bókstavinum; hvørs rós *er* ikki av monnum, men av Guði.

KAPITUL 3

HVØNN fyrimun hevur tá Jødin? ella hvat gagn *er* av umskering?
2 Mikið á hvønn *ein* hátt: helst av tí at teim vórðu Guðs oraklar litnir til.
3 Tí at hvat um *tað, um* summir trúðu ikki? skal teirra vantrúgv gera Guðs trúgv uttan virkni?
4 Guð sýti *fyri:* ja, latið Guð vera sann*orðaðan*, men hvønn mann ein lygnara; eins og skrivað stendur, At tú máttirt verðið rættvísgjørdur í tínum framsøgnum, og máttirt yvirvunnið tá tú verðurt dømdur.
5 Men um órættvísi okkara viðmæli rættvísi Guðs, hvat skulu vit siga? *Er* Guð órættvísur, sum tekur hevnd? (Eg tali eins og maður)
6 Guð sýti *fyri:* tí at hvussu skal Guð tá døma heimin?
7 Tí at um sannleiki Guðs er vorðin meiri ríkiligur gjøgnum mína lygn honum til dýrdar; hví enn verði eg eisini dømdur sum ein syndari?
8 Og ikki *heldur,* (eins og vit verða útspillingarligani ummæltir, og sum onkrir hevda at vit

siga,) Latum okkum gera ilt, at gott má koma *burturúr?* hvørs heldøming rættvís er.

9 Hvat tá? eru vit betri *enn teir?* Nei, á ongan vís: tí at vit hava áður prógvað bæði Jødar og Heidningar, at teir eru allir undir synd;

10 Eins og skrivað stendur, Tað er eingin rættvísur, nei, ikki ēin:

11 Tað er eingin sum skilur; tað er eingin sum søkir eftir Guði.

12 Teir eru allir farnir út av veginum, teir eru tilsaman vorðnir gagnleysir; tað er eingin sum ger gott, nei, ikki ēin.

13 Teirra barki *er* eitt opið gravhýsi; við sínum tungum teir hava brúkt svik; eitrið av eiturormum *er* undir teirra varrum:

14 Hvørs munnur *er* fullur av banning og beiskleika:

15 Teirra føtur *eru* fljótir at úthella blóð:

16 Oyðing og vesældómur *eru* á teirra vegum:

17 Og friðarvegin hava teir ikki kent:

18 Tað er eingin ótti fyri Guði frammi fyri eygum teirra.

19 Nú, vit vita, at hvørjar lutir sumhelst *ið* lógin sigur, sigur hon til teirra sum eru undir lógini: at hvør muður má verða teptur, og allur heimurin má gerast sekur frammi fyri Guði.

20 Tessvegna, við^ gerningum lógarinnar skal einkið kjøt verða rættvísgjørt fyri eygsjón hansara: tí at við^ lógini *er* kunnleikin til synd.

21 Men nú er rættvísi Guðs uttan lógina gjørd eyðsýnd, verandi vitnað við^ lógini og prophetunum;

22 Enntá Guðs rættvísi, *sum er* við^ trúgv hjá Jesusi Christi til alra og uppá allar teir sum trúgva: tí at eingin munur er:

23 Tí at allir hava syndað, og *eru* komnir til kort av Guðs dýrd;

24 Verðandi rættvísgjørdir uttan viðurlag av náði hansara, gjøgnum endurloysingina sum er í Christi Jesusi:

25 Hvønn Guð hevur sett fram *til at vera* ein fyribøting gjøgnum trúgv á blóð hansara, at kunngera sína rættvísi til eftirgevingina av syndum sum eru umlidnar, gjøgnum yvirberinsemi Guðs;

26 At kunngera, *sigi eg,* á hesi tíð sína rættvísi: at hann mátti vera rættvísur, og rættvísgerarin av honum sum trýr á Jesus.

27 Hvar *er* tá rósan*in?* Hon er útistongd. Við^ hvørji lóg? gerninga? Nei: men við^ trúarlóg.

28 Tí gera vit *ta* niðurstøðu, at maður verður rættvísgjørdur við^ trúgv uttan gerningar lógarinnar.

29 *Er hann* Guð Jødanna einans? *er hann* ikki eisini Heidninganna? Jú, eisini Heidninganna:

30 Við tað at *tað er* ēin Guð, sum skal rættvísgera umskeringina við^ trúgv, og óumskeringina gjøgnum trúgv.

31 Gera vit tá lógina ógilda gjøgnum trúgv? Guð sýti *fyri:* ja, vit staðfesta lógina.

KAPITUL 4

HVAT skulu vit tá siga, at Ábraham, faðir okkara, hvat kjøtinum tilhoyrir, hevur funnið?

2 Tí at um Ábraham varð rættvísgjørdur við^ verkum, hevur hann *hvarav* at rósa *sær;* men ikki frammi fyri Guði.

3 Tí at hvat sigur skriftin? Ábraham trúði Guði, og tað varð roknað honum til rættvísi.

4 Nú, til hansara sum *ger* verk, verður endurgjaldið ikki roknað av náði, men av skyldugleika.

5 Men til hansara sum *ger* ikki verk, men trýr á hann sum rættvísger hin ógudiliga, trúgv hansara verður roknað til rættvísi.

6 Enntá sum Dávid eisini lýsir signaðssemi tess mans, hvørjum Guð tilroknar rættvísi uttan verk^,

7 *Sigandi,* Signaðir *eru* teir, hvørs misgerðir eru fyrigivnar, og hvørs syndir eru dekkaðar.
8 Signaður *er* tann maður, til hvørs Harrin vil ikki tilrokna synd.
9 *Kemur* henda signaðssemi tá uppá umskeringina *einans,* ella uppá óumskeringina eisini? tí at vit siga, at trúgv varð roknað Ábrahami til rættvísi.
10 Hvussu varð hon tá roknað? tá ið hann var í umskering, ella í óumskering? Ikki í umskering, men í óumskering.
11 Og hann móttók umskeringar-tekinið, eitt innsigli á rættvísini av trúnni sum *hann hevði,* verandi *enn* óumskorin: at hann átti vera faðirin at øllum teim sum trúgva, tó *at* teir veri ikki umskornir; at rættvísi átti verða tilroknað teimum eisini:
12 Og faðirin at umskering hjá teimum ið eru ikki av umskeringini einans, men sum eisini ganga í sporunum av teirri trúgv faðirs okkara Ábrahams, sum *hann hevði,* verandi *enn* óumskorin.
13 Tí at fyrijáttanin, at hann skuldi verða arvingi heimsins, *var* ikki til Ábrahams, ella til sáðs hansara, gjøgnum lógina, men gjøgnum rættvísina av trúgv.
14 Tí at um teir, sum eru av lógini, *veri* arvingar, er trúgv gjørd ógild, og fyrijáttanin gjørd uttan virkni:
15 Av tí at lógin virkar vreiði: tí at har *sum* eingin lóg er, *har er* einkið misbrot.
16 Tí *er tað* av trúgv, at *tað átti vera* av náði; til tess endamáls, *at* fyrijáttanin átti vera viss fyri øllum sáðinum; ikki fyri tí einans sum er av lógini, men fyri tí eisini sum er av trúgv Ábrahams; sum er faðirin at okkum øllum,
17 (Eins og skrivað stendur, Eg havi gjørt teg *til* ein faðir at mongum tjóðum,) frammi fyri honum, hvørjum hann trúði, *enntá* Guði, hvør livandiger hinar deyðu, og kallar hasi ting sum veri ikki, sum um tey vóru.
18 Sum^{P} ímóti vón trúði í vón, at hann átti gerast faðirin at mongum tjóðum; samsvarandi við tað sum varð talað, Soleiðis skal sáð títt verða.
19 Og ei verandi veikur í trúgv, hugleiddi hann ikki sítt likam nú deytt, tá ið hann var um hundrað ára gamalur, eiheldur tó deyðleikan av móðurlívi Sáru:
20 Hann vinglaði ikki at fyrijáttan Guðs gjøgnum vantrúgv; men var sterkur í trúgv, gevandi æru til Guðs;
21 Og, verandi fult sannførdur *um,* at tað *sum* hann hevði lovað, var hann mentur eisini at útinna.
22 Og tí varð tað tilroknað honum til rættvísi.
23 Nú, tað varð ikki skrivað fyri hansara skyld aleina, at tað varð tilroknað til hansara;
24 Men fyri okkum eisini, til hvørja tað skal verða tilroknað, um vit trúgva á hann sum reisti upp Jesus — Harra okkara — frá teimum deyðu;
25 Sum^{P} varð givin upp fyri okkara misgerðir, og varð reistur aftur fyri okkara rættvísgering.

KAPITUL 5

TESSVEGNA, verandi rættvísgjørdir við$^{\hat{}}$ trúgv, hava vit frið við Guð gjøgnum Harra váran Jesus Christ:
2 Við$^{\hat{}}$ hvørjum^{P} eisini vit hava atgongd við$^{\hat{}}$ trúgv inn í hesa náði, í hvørji vit standa, og frøast í vón um Guðs dýrd.
3 Og ikki einans *so,* men vit rósa *okkum* í trongslum eisini: vitandi, at trongsla virkar tolmóð;
4 Og tolmóð roynslu; og roynsla vón:
5 Og vón ger ikki til skammar; tí at kærleiki Guðs er heltur

útumkring í okkara hjørtum viðˆ Halga Andanum, sum okkum er givin.

6 Tí at tá ið vit vóru enn uttan styrki, til ásetta tíð Christus doyði fyri hinar ógudiligu.

7 Tí at neyvan fyri ein rættvísan mann vil ēin doyggja: tó møguliga fyri ein góðan mann vildu summir enntá vágað *sær* at doyð.

8 Men Guð viðmælir kærleika sínum mótvegis okkum, í at, meðan vit enn vóru syndarar, Christus doyði fyri okkum.

9 Mikið meira tá, verandi nú rættvísgjørdir viðˆ blóði hansara, skulu vit vera frelstir frá vreiði gjøgnum hann.

10 Tí at um, tá ið vit vóru figgindar, vit vórðu endursónaðir til Guðs viðˆ deyða Sonar hansara, mikið meira, verandi endursónaðir, skulu vit vera frelstir viðˆ lívi hansara.

11 Og ikki einans *hetta,* men vit eisini frøast í Guði gjøgn Harra váran Jesus Christ, viðˆ hvørjum vit hava nú fingið sáttargerðina.

12 Hvørsvegna, eins og viðˆ ēinum manni synd kom inn í heimin, og deyði viðˆ synd; og soleiðis deyði fluttist uppá allar menn, tí at allir hava syndað:

13 (Tí at inntil lógina var synd í heiminum: men synd verður ikki tilroknað, tá ið eingin lóg er.

14 Hóast hetta, deyði ráddi frá Adami til Móses, sjálvt yvir teimum sum høvdu ikki syndað eftir líkleikanum við misbrot Adams, hvør er mynd hansara sum koma skuldi.

15 Men ikki eins og misbrotið, soleiðis eisini *er* hin fría gávan. Tí at um gjøgnum misbrotið hjá ēinum mangir veri deyðir, mikið meira er náði Guðs, og gávan av náði, *sum er* viðˆ ēinum manni, Jesusi Christi, vorðin ríkilig at mongum.

16 Og ikki eins og *tað var* viðˆ ēinum sum syndaði, *soleiðis er* gávan: tí at dómurin *var* viðˆ ēinum til fordømingar, men hin fría gávan *er* av mongum misbrotum til rættvísgeringar.

17 Tí at um viðˆ misbrotinum hjá ēinum manni, deyði ráddi viðˆ ēinum; mikið meira teir, sum fáa ríkiligsemi av náði og av rættvísisgávuni, skulu ráða í lívi viðˆ ēinum, Jesusi Christi.)

18 Tessvegna, eins og viðˆ misbrotinum hjá ēinum, *dómur kom* uppá allar menn til fordømingar; enntá soleiðis viðˆ rættvísini hjá ēinum, *kom hin fría gávan* uppá allar menn til lívs-rættvísgeringar.

19 Tí at eins og viðˆ ólýdninum hjá ēinum manni, mangir vórðu gjørdir syndarar, soleiðis viðˆ lýdninum hjá ēinum skulu mangir verða gjørdir rættvísir.

20 Harafturat kom lógin inn, at misgerðin mátti gerast ríkilig. Men har *sum* synd gjørdist ríkilig, gjørdist náði mikið meira ríkilig:

21 At eins og synd hevur rátt til deyða, enntá soleiðis skuldi náði ráða gjøgnum rættvísi til ævigt lív viðˆ Jesusi Christi Harra várum.

KAPITUL 6

HVAT skulu vit tá siga? Skulu vit halda áfram í synd, *fyri* at náði kann gerast ríkilig?

2 Guð sýti *fyri.* Hvussu skulu vit, sum eru deyðir fyri synd, longur liva harí?

3 Vita tit ikki, at so mangir av okkum sum vórðu doyptir inn í Jesus Christ, vórðu doyptir inn í deyða hansara?

4 Tí eru vit grivnir við honum viðˆ dópi inn í deyða: at líka sum Christus varð reistur upp frá teimum deyðu viðˆ dýrd Faðirsins, enntá soleiðis skuldu vit eisini ganga í nýggjleika lívs.

5 Tí at um vit eru vorðnir gróðursettir saman í líkleika deyða hansara, skulu vit verða *tað* eisini *í líkleika* uppreisnar *hansara:*

6 Vitandi hetta, at okkara gamli maður er krossfestur við *honum,* at syndalikamið mátti verða oyðilagt, at hiðanífrá vit skuldu ikki tæna synd.

7 Tí at hann, sum er deyður, er fríaður frá synd.

8 Nú, um vit veri deyðir við Christi, trúgva vit, at vit skulu eisini liva við honum:

9 Vitandi, at Christus, verandi reistur frá teimum deyðu, doyr ikki meira; deyði hevur ei meira harradømi yvir honum.

10 Tí at í at hann doyði, doyði hann yvirfyri synd ēinaferð: men í at hann livir, livir hann yvirfyri Guði.

11 Líkaleiðis roknið tit eisini tykkum sjálvar at vera deyðar í roynd *og veru* yvirfyri synd, men livandi yvirfyri Guði gjøgnum Jesus Christ váran Harra.

12 Latið ikki synd, tessvegna, ráða í tykkara deyðiliga likami, at tit skuldu lýtt henni í girndunum hjá tí.

13 Eiheldur veiti tit tykkara limir *sum* amboð hjá órættvísi yvirfyri synd: men veitið tykkum sjálvar yvirfyri Guði, eins og teir sum eru livandi frá teimum deyðu, og tykkara limir *sum* amboð hjá rættvísi yvirfyri Guði.

14 Tí at synd skal ikki hava harradømi yvir tykkum: tí at tit eru ikki undir lógini, men undir náði.

15 Hvat tá? skulu vit synda, av tí at vit eru ikki undir lógini, men undir náði? Guð sýti *fyri.*

16 Vita tit ikki, at til hvørs tit lata tykkum sjálvar *sum* tænarar at lýða, hansara tænarar tit eru, hvønn tit lýða; hvørt hjá synd at deyða, ella hjá lýdni at rættvísi?

17 Men Guð veri takkaður, at tit vóru tænarar syndarinnar, men tit hava lýtt frá hjartanum tí sniði av Guðslæru, sum varð fingið tykkum.

18 Verandi tá gjørdir fríir frá synd, gjørdust tit tænararnir hjá rættvísi.

19 Eg tali eftir háttarlagi manna vegna veikleika kjøts tykkara: tí at eins og tit hava latið tykkara limir *sum* tænarar fyri óreinsku og fyri misgerð at misgerð; enntá soleiðis nú latið tykkara limir *sum* tænarar fyri rættvísi at heilagleika.

20 Tí at tá ið tit vóru tænararnir hjá synd, vóru tit fríir frá rættvísi.

21 Hvønn ávøkst høvdu tit tá í hasum tingunum, við hvørji tit nú skammast? tí at endin á teimum tingunum *er* deyði.

22 Men nú, verandi gjørdir fríir frá synd, og vorðnir tænarar fyri Guði, hava tit tykkara ávøkst at heilagleika, og endin *er* ævigtvarandi lív.

23 Tí at løn syndarinnar *er* deyði; men gáva Guðs *er* ævigt lív gjøgnum Jesus Christ váran Harra.

KAPITUL 7

VITA tit ikki, brøður, (tí at eg tali til teirra sum kenna lógina,) hvussu ið lógin hevur harradømi yvir einum manni, so leingi sum hann livir?

2 Tí at kvinnan, sum hevur ein ektamann, er bundin viðˆ lógini til ektamann *sín,* so leingi sum hann livir; men um ektamaðurin veri *seg* deyður, er hon loyst frá lóg ektamans *síns.*

3 So at um, meðan ektamaður *hennara* livir, hon verði gift við einum øðrum manni, skal hon verða kallað ein horinna: men um ektamaður hennara veri deyður, er hon frí frá teirri lóg; so at hon er eingin horinna, tó *at* hon verði gift við einum øðrum manni.

4 Hvørsvegna, brøður mínir, tit eisini eru vorðnir deyðir fyri lógini viðˆ likami Christs; at tit skuldu verða giftir við einum

øðrum, *enntá* við honum sum er reistur frá teimum deyðu, at vit skuldu bera fram ávøkst at Guði.

5 Tí at tá ið vit vóru í kjøtinum, syndadriftirnar, sum vóru við lógini, virkaðu í okkara limum til at bera fram ávøkst at deyða.

6 Men nú eru vit útfríaðir frá lógini, at, verandi deyðir í hvørjum vit vóru hildnir; at vit skuldu tæna í nýggjum lagi anda, og ikki *í* hinum gamla lagi bókstavsins.

7 Hvat skulu vit tá siga? *Er* lógin synd? Guð sýti *fyri*. Nei, eg hevði ikki kent synd, uttan viðˆ lógini: tí at eg hevði ikki kent girnd, uttan lógin hevði sagt, Tú skalt ikki girnast.

8 Men synd, takandi tilevni viðˆ boðinum, virkaði í mær alskyns girndarsemi. Tí at uttan lógina *var* synd deyð.

9 Tí at eg var livandi uttan lógina ēinaferð: men tá ið boðið kom, livnaði synd við aftur, og eg doyði.

10 Og boðið, sum *varð fyriskipað* til lívs, fann eg *at vera* at deyða.

11 Tí at synd, takandi tilevni viðˆ boðinum, tøldi meg, og viðˆ tí drap *meg*.

12 Hvørsvegna lógin *er* heilag, og boðið heilagt, og rættvíst, og gott.

13 Varð tá tað, sum er gott, gjørt *til* deyða fyri mær? Guð sýti *fyri*. Men synd, at hon mátti sýnast synd, virkandi deyða í mær viðˆ tí sum er gott; at synd viðˆ boðinum mátti gerast ovurhonds syndafull.

14 Tí at vit vita, at lógin er andlig: men eg eri kjøtligur, seldur undir synd.

15 Tí at tað sum eg geri, samtykki eg ikki: tí at tað *sum* eg vildi, tað geri eg ikki; men tað *sum* eg hati, tað geri eg.

16 Um eg tá geri hatta sum eg vildi ikki, gevi eg lógini viðhald, at *hon er* góð.

17 Nú er tað tá ei meira eg sum geri tað, men synd sum í mær býr.

18 Tí at eg veit, at í mær, (tað er, í kjøti mínum,) býr einkið gott ting: tí at vilja er tilstaðar hjá mær; men *hvussu* at útføra tað sum er gott, finni eg ikki.

19 Tí at tað góða sum eg vildi, geri eg ikki: men hitt illa sum eg vildi ikki, tað geri eg.

20 Nú, um eg geri tað eg ikki vildi, er tað ei meira eg sum geri tað, men synd sum í mær býr.

21 Eg finni tá eina lóg, at tá ið eg vildi gjørt gott, er ilt tilstaðar hjá mær.

22 Tí at eg *havi* hugnað í Guðs lóg eftir hinum innvortis manni:

23 Men eg síggi eina aðra lóg í limum mínum, kríggjandi ímóti lóg hugar míns, og førandi meg inn í fangaskap til lóg syndarinnar, sum er í limum mínum.

24 O neyðars maður sum eg eri! hvør skal útfría meg frá likaminum av hesum deyða?

25 Eg takki Guði gjøgnum Jesus Christ váran Harra. So tæni tá eg sjálvur við huganum lóg Guðs; men við kjøtinum lóg syndarinnar.

KAPITUL 8

TAÐ er tessvegna nú eingin fordøming hjá teimum sum eru í Christi Jesusi, sum ganga ikki eftir kjøtinum, men eftir Andanum.

2 Tí at lóg lívsins Anda í Christi Jesusi hevur gjørt meg frían frá lóg syndarinnar og deyðans.

3 Tí at tað *sum* lógin ei kundi gera, í at hon var veik gjøgnum kjøtið, Guð, sendandi sín egna Son í líkleikanum av syndigum kjøti, og fyri synd, dómfeldi synd í kjøtinum:

4 At rættvísi lógarinnar mátti verða uppfylt í okkum, sum ganga ikki eftir kjøtinum, men eftir Andanum.

5 Tí at teir sum eru eftir kjøtinum, íhuga tingini av kjøtinum;

men teir sum eru eftir Andanum, tingini av Andanum.

6 Tí at vera kjøtliga hugaður *er* deyði; men at vera andliga hugaður *er* lív og friður.

7 Av tí at hin kjøtligi hugurin *er* figgindskapur ímóti Guði: tí at hann er ikki undirgivin fyri Guðs lóg, víst eiheldur kann vera.

8 So at teir, sum eru í kjøtinum, kunnu ikki toknast Guði.

9 Men tit eru ikki í kjøtinum, men í Andanum, um so veri at Guðs Andi dvøljist í tykkum. Nú, um nakar maður havi ikki Anda Christs, hann er ikki ēin av hansara.

10 Og um Christus *veri* í tykkum, *tá er* likamið deytt syndar vegna; men Andin *er* lív rættvísis vegna.

11 Men um Andi hansara, sum reisti upp Jesus frá teimum deyðu, dvøljist í tykkum, *tá* skal hann, sum reisti upp Christ frá teimum deyðu, eisini livandigera tykkara deyðiligu likam við^ Anda sínum sum dvølist í tykkum.

12 Tessvegna, brøður, eru vit skuldnarar, ikki til kjøtið, at liva eftir kjøtinum.

13 Tí at um tit livi eftir kjøtinum, skulu tit doyggja: men um tit, gjøgnum Andan, deyði gerðir likamsins, skulu tit liva.

14 Tí so mangir sum verða leiddir av Anda Guðs, teir eru synir Guðs.

15 Tí at tit hava ikki fingið trældóms-andan aftur til ræðslu; men tit hava fingið ættleiðingar-Andan, við^ hvørjum vit rópa, Abba, Faðir.

16 Sjálvur Andin vitnar við anda okkara, at vit eru børn Guðs:

17 Og um børn, tá arvingar; arvingar hjá Guði, og samarvingar við Christi; um so veri, at vit líða við *honum,* at vit mega verða eisini dýrðmettir saman.

18 Tí at eg rokni, at líðingarnar av hesi núverandi tíð *eru* ikki verdar *at verða sammettar* við ta dýrd sum skal verða opinberað í okkum.

19 Tí hin inniliga eftirvæntanin hjá skapninginum bíðar eftir tilkennargevingini av sonum Guðs.

20 Tí at skapningurin varð gjørdur undirgivin fyri fáfongd, ikki viljugliga, men uppá grund av honum sum hevur undirgivið *hin sama* í vón,

21 Av tí at skapningurin sjálvur eisini skal verða útfríaður frá trældómi forgongiligleikans inn í hitt dýrdmikla frælsi Guðs barna.

22 Tí at vit vita, at allur skapningurin venast og verkjast í pínu tilsaman inntil nú.

23 Og ikki einans *teir,* men vit sjálvir eisini, sum hava frumávøkstir Andans, enntá vit sjálvir venast innan í okkum sjálvum, bíðandi eftir ættleiðingini, *tað vil siga,* endurloysingini av likami okkara.

24 Tí at vit eru frelstir við^ vón: men vón, sum sæst, er ikki vón: tí at tað, ein maður sær, hví vónar hann enn eftir *tí?*

25 Men um vit vóna eftir tí vit ikki síggja, *tá* við tolmóði bíða vit eftir *tí.*

26 Somuleiðis Andin eisini hjálpir okkara veikleikum: tí at vit vita ikki hvørjum vit skuldu biðja fyri, sum vit áttu: men Andin sjálvur gongur í forbøn fyri okkum við veningum, sum kunnu ikki verða mæltar.

27 Og hann, sum rannsakar hjørtuni, veit hvat hugur Andans *er,* av tí at hann gongur í forbøn fyri hinum heilagu samsvarandi við *vilja* Guðs.

28 Og vit vita, at øll ting samvirka til góða fyri teimum sum elska Guð, fyri teimum ið eru hinir kallaðu samsvarandi við *hansara* fyriætlan.

29 Tí at hvørjar hann fyrifram kendi, *teir* fyritilætlaði hann eisini *at verða* sammyndaðar til mynd Sonar síns, at hann mátti vera hin fyrstiføddi millum mangar brøður.
30 Harumframt, hvørjar hann fyritilætlaði, teir kallaði hann eisini: og hvørjar hann kallaði, teir rættvísgjørdi hann eisini: og hvørjar hann rættvísgjørdi, teir dýrðmetti hann eisini.
31 Hvat skulu vit tá siga um hesi tingini? Um Guð *veri* fyri okkum, hvør *kann tá vera* ímóti okkum?
32 Hann sum spardi ikki sín egna Son, men gav hann upp fyri okkum øll, hvussu skal hann ikki við honum eisini frítt geva okkum øll ting?
33 Hvør skal leggja nakað ting til ákæru Guðs útvaldu? *Tað er* Guð sum rættvísger.
34 Hvør *er* hann sum fordømir? *Tað er* Christus sum doyði, ja heldur, sum er risin aftur, sum er enntá við Guðs høgru hond, sum eisini gongur í forbøn fyri okkum.
35 Hvør skal atskilja okkum frá kærleika Christs? *skal* trongsla, ella neyð, ella atsókn, ella svøltur, ella nakni, ella váði, ella svørð?
36 Eins og skrivað stendur, Fyri tína skyld verða vit dripnir allan dagin langan; vit verða roknaðir sum seyður til slátringina.
37 Nei, í øllum hesum tingum eru vit meira enn sigursvinnarar ígjøgnum hann sum elskaði okkum.
38 Tí at eg eri sannførdur *um,* at hvørki deyði, ella lív, ella einglar, ella fúrstadømir, ella máttir, ella ting˘ núverandi, ella ting˘ sum koma skulu,
39 Ella hædd, ella dýpd, ella nakar annar skapningur, skal vera ført fyri at skilja okkum frá kærleika Guðs, sum er í Christi Jesusi Harra okkara.

KAPITUL 9

EG sigi sannleikan í Christi, eg ljúgvi ikki, mín samvitska eisini berandi mær vitnisburð í Halga Andanum,
2 At eg havi mikla tyngslu og áhaldandi sorg í hjarta mínum.
3 Tí at eg kundi ynskt, at eg sjálvur varð bannaður frá Christi fyri brøður mínar, mínar skyldmenn samsvarandi við kjøtið:
4 Sum eru Ísraelitar; til hvørja *tilhoyrir* ættleiðingin, og dýrdin, og sáttmálarnir, og gevingin av lógini, og tænastan *av Guði,* og fyrijáttanirnar;
5 Hvørs *eru* fedrarnir; og av hvørjum – hvat kjøtið viðvíkur – Christus *kom,* sum er yvir øllum, Guð signaður um ævir. Á˙men.
6 Ikki sum um Guðs orð onga ávirkan hevur fingið. Tí at teir *eru* ikki allir Ísrael, sum eru av Ísrael:
7 Eiheldur, av tí at teir eru sáð Ábrahams, *eru teir* allir børn: men, Í Ísaaki skal sáð títt verða kallað.
8 Tað er, Teir, sum eru kjøtsbørnini, hesir *eru* ikki børn Guðs: men fyrijáttanar-børnini verða roknaðir fyri sáðið.
9 Tí at hetta *er* fyrijáttanar-orðið, Um hesa tíð skal eg koma, og Sára skal hava ein son.
10 Og ikki einans *hetta;* men tá ið Rebekka eisini var vorðin við gitnað við ðinum, *enntá* við faðir okkara Ísaaki;
11 (Tí at *børnini,* verandi ikki enn føddir, eiheldur havandi gjørt nakað gott ella ilt, *fyri* at fyriætlan Guðs samsvarandi við útveljing mátti standa, ikki av verkum, men av honum sum kallar;)
12 Varð tað sagt við hana, Hin eldri skal tæna hinum yngra.
13 Sum skrivað stendur, Jákob havi eg elskað, men Esav havi eg hatað.
14 Hvat skulu vit tá siga? *Er til* órættvísi hjá Guði? Guð sýti *fyri.*

15 Tí at hann sigur til Mósesar,
Eg vil hava miskunn yvir hvønn
ið eg vil hava miskunn, og eg vil
hava várkunn yvir hvønn *ið* eg vil
hava várkunn.
16 So *er tað* tá ikki av honum ið
vil, ella av honum ið rennur, men
av Guði sum sýnir miskunn.
17 Tí at skriftin sigur við Pharaoh, Enntá fyri hetta sama endamál havi eg reist teg upp, at eg
mátti sýna mátt mín í tær, og at
navn mítt mátti verða kunngjørt
út gjøgnum alla jørðina.
18 Tí hevur hann miskunn yvir
hvønn *ið* hann vil *hava miskunn,*
og hvønn hann vil herðir hann.
19 Tú vilt tá siga við meg, Hví
finnur hann enn feil? Tí at hvør
hevur staðið ímóti vilja hansara?
20 Nei men, O maður, hvør ert
tú sum svarart aftur ímóti Guði?
Skal tað myndaða tingið siga til
hansara sum myndaði *tað,* Hví
hevurt tú gjørt meg svá?
21 Hevur ikki pottamakarin
mátt yvir leirinum, úr hinum sama
klumpi at gera ēitt ker til heiðurs,
og eitt annað til vanheiðurs?
22 *Hvat* um Guð, viljugur at
sýna *sína* vreiði, og at gera mátt
sín kunnan, úthelt við miklum
langmóði vreiðis-kerini — hóskilig til oyðingar:
23 Og at hann mátti gera
kunnar ríkdómarnar av síni dýrd
á miskunnar-kerini, sum hann
hevði frammanundan fyribúgvið
til dýrdar,
24 Enntá okkum, hvørjar hann
hevur kallað, ikki av Jødunum eina,
men eisini av Heidningunum?
25 Eins og hann sigur eisini í
Ó-sē´-á, Eg vil kalla tey fólk mítt,
sum vóru ikki fólk mítt; og hana
háttelskaða, sum ei var háttelskað.
26 Og tað skal bera á, *at* á tí staði,
har tað varð sagt við tey, Tit *eru*
ikki fólk mítt; har skulu tey verða
kallað børn hins livandi Guðs.
27 Ē-sāĭ´-ās eisini rópar viðvíkjandi Ísrael, Tó *at* talið á børnum
Ísraels veri sum sandur havsins,
skal ein leivd verða frelst:
28 Tí at hann vil fullgera verkið,
og skera *tað* stutt í rættvísi: tí eitt
stutt verk vil Harrin gera uppiá
jørðini.
29 Og sum Ê-sāĭ´-ās segði áður,
Uttan Harri Sā´-bă-ŏth-s hevði
eftirlatið okkum eitt sáð, høvdu
vit verðið sum Sŏ´-dô-mă, og verðið gjørdir líkir Gō-mŏr´-rhŭ.
30 Hvat skulu vit tá siga? At
Heidningarnir, sum fylgdu ikki
eftir rættvísi, hava nátt til rættvísi,
enntá rættvísina sum er av trúgv.
31 Men Ísrael, sum fylgdi eftir
lóg rættvísis, hevur ikki nátt til
lóg rættvísis.
32 Hvørsvegna? Av tí at *teir*
søktu hana ikki við^ trúgv, men
sum var tað við^ verkum lógarinnar. Tí at teir snávaðu um
handa snávingarsteinin;
33 Eins og skrivað stendur, Sí,
eg leggi í Sĭ´-ŏn ein snávingarstein
og meinbogaklett: og hvørsumhelst *ið* trýr á hann, skal ei verða
til skammar.

KAPITUL 10

BRØÐUR, mín hjartans trá og bøn til Guðs fyri Ísrael er, at teir máttu verðið frelstir.
2 Tí at eg beri teim vitnisburð, at teir hava eitt vandlæti um Guð, men ikki samsvarandi við kunnleika.
3 Tí at teir, verandi óvitandi um Guðs rættvísi, og gangandi um fyri at seta á stovn sína egnu rættvísi, hava ikki givið seg sjálvar undir Guðs rættvísi.
4 Tí at Christus *er* endin á lógini til rættvísi fyri hvønn tann sum trýr.
5 Tí at Móses lýsir rættvísina sum er av lógini, At tann maðurin sum ger tey tingini, skal liva við^ teimum.
6 Men rættvísin, sum er av

trúgv, talar á hesa vís, Sig ikki í hjarta tínum, Hvør skal stíga upp inn í himin? (tað er, at føra Christ niður *úr erva:)*

7 Ella, Hvør skal stíga niður inn í djúpið? (tað er, at føra upp Christ aftur frá teimum deyðu.)

8 Men hvat sigur hon? orðið er tær nær, *enntá* í munni tínum, og í hjarta tínum: tað er trúarorðið sum vit prædika;

9 At um tú skalt játta við tínum munni Harran Jesus, og skalt trúgva í tínum hjarta at Guð hevur reist hann frá teimum deyðu, *so* skalt tú verða frelstur.

10 Tí at við hjartanum trýr maður til rættvísi; og við munninum verður játtan gjørd til frelsu.

11 Tí at skriftin sigur, Hvørsumhelst *ið* trýr á hann, skal ikki verða til skammar.

12 Tí at tað er eingin munur á Jødanum og Grikkanum: tí hin sami Harrin yvir øllum er ríkur at øllum sum kalla uppá hann.

13 Tí at hvørsumhelst *ið* skal kalla uppá navn Harrans, skal verða frelstur.

14 Hvussu skulu teir tá kalla á hann, á hvønn teir ei hava trúð? og hvussu skulu teir trúgva á hann, um hvønn teir ei hava hoyrt? og hvussu skulu teir hoyra, uttan ein prædikara?

15 Og hvussu skulu teir prædika, uttan teir verði sendir? eins og skrivað stendur, Hvør fagrir eru føtur teirra sum prædika gleðiboðskap friðarins, og bera glað tíðindir um góð ting!

16 Men teir hava ikki allir aktað gleðiboðskapin. Tí at Ê-saí´-ás sigur, Harri, hvør hevur trúð frágreiðing okkara?

17 So *kemur* tá trúgv við^ hoyring, og hoyring við^ orði Guðs.

18 Men eg sigi, Hava teir ikki hoyrt? Jú sanniliga, teirra ljóð fór út í alla jørðina, og teirra orð^ at endum veraldarinnar.

19 Men eg sigi, Vitsti ikki Ísrael? Fyrst sigur Móses, Eg vil eggja tykkum til ástbrelnis við^ *teimum sum eru* einkið fólk, *og* við^ eini fávitskutari tjóð vil eg øsa tykkum.

20 Men Ê-saí´-ás er sera djarvur, og sigur, Eg varð funnin av teimum ið søktu meg ei; eg varð gjørdur eyðsýndur teimum ið ei spurdu eftir mær.

21 Men til Ísraels sigur hann, Allan dagin langan havi eg rætt út mínar hendur at einum ólýdnum og andmælandi fólki.

KAPITUL 11

EG sigi tá, Hevur Guð kastað burt fólk sítt? Guð sýti *fyri*. Tí at eg eisini eri ein Ísraeliti, av Ábrahams sáði, *av* Benjamins ætt.

2 Guð hevur ikki kastað burt fólk sítt, sum hann fyri*fram* kendi. Vita tit ikki hvat skriftin sigur um Ê-lí´-ás? hvussu hann gongur í forbøn til Guðs ímóti Ísrael, sigandi,

3 Harri, teir hava dripið tínar prophetar, og grivið niður tíni altar; og eg eri einsamallur eftir, og teir søkja mítt lív.

4 Men hvat sigur Guðs aftursvar við hann? Eg havi goymt niðurfyri til mín sjálvs sjey túsund menn, sum hava ikki boygt knæinum fyri *myndini av* Bā´-ăl-i.

5 Enntá soleiðis í hesi núverandi tíð eisini er tað tá ein leivd samsvarandi við náði-útveljingina.

6 Og um av náði, tá *er tað* ei meira av verkum: annars er náði ei meira náði. Men um *tað veri* av verkum, tá er tað ei meira náði: annars er verk ei meira verk.

7 Hvat tá? Ísrael hevur ikki uppnátt tað sum hann søkir eftir; men útveljingin hevur uppnátt tað, og restin vórðu blindaðir

8 (Samsvarandi sum skrivað stendur, Guð hevur givið teimum durvi-andan; eygu, at teir ei skuldu síggja; og oyru, at teir ei skuldu hoyra;) at hesum degi.

9 Og Dávid sigur, Lat teirra borð verða gjørt *til* eina snerru, og eina fellu, og ein snávingarstein, og eitt endurgjald at teimum:
10 Lat teirra eygu verða myrkjað, at teir ei mega síggja, og boygg niður teirra rygg alveg.
11 Eg sigi tá, Hava teir snávað, at teir skuldu falla? Guð sýti *fyri:* men *heldur* gjøgnum teirra fall *er* frelsa *komin* til Heidninganna, fyri at eggja teir til ástbrelnis.
12 Nú, um teirra fall *veri* ríkidømini hjá heiminum, og teirra minking ríkidømini hjá Heidningunum; hvør mikið meira teirra fylling?
13 Tí at eg tali til tykkum Heidningar, so framt sum eg eri ápostul Heidninganna, *so* seti eg hátt mítt embæti:
14 Um við nøkrum háttarlagi eg mátti eggjað til ágrýtnis *teir sum eru* kjøt mítt, og mátti frelst summar av teimum.
15 Tí um kastingin burtur av teimum *veri* endursóning heimsins, hvat *skal* móttakingin *av teimum verða,* annað *enn* lív frá teimum deyðu?
16 Tí at um frumávøksturin *veri seg* heilagur, *er* deiggið eisini *heilagt:* og um rótin *veri seg* heilag, somuleiðis *eru* greinarnar.
17 Og um summar av greinunum veri *seg* brotnar av, og tú, verandi eitt vilt olivintræ, varðst gróðursettur inn teirra millum, og við teimum luttekurt í rót og fiti olivintræsins;
18 Rósa *tær* ikki ímóti greinunum. Men um tú rósi *tær,* tú bert ikki rótina, men rótin teg.
19 Tú vilt tá siga, Greinarnar vórðu brotnar av, *fyri* at eg mátti verða gróðursettur inn.
20 Rætt; vegna vantrúgv vórðu tær brotnar av, og tú stendurt við trúgv. Ver ikki hugmóðigur, men óttast:
21 Tí um Guð spardi ikki tær náttúrligu greinarnar, *gev gætur* at ikki hann eisini spari ikki teg.
22 Síggið tí góðsku og strangleika Guðs: á teir sum fullu, strangleika; men mótvegis tær, góðsku, um tú haldi áfram í góðsku *hansara:* annars skalt tú eisini verða høgdur av.
23 Og teir eisini, um teir ei verði *verandi* áfram í vantrúgv, skulu verða gróðursettir inn: tí at Guð er mentur at gróðurseta teir inn aftur.
24 Tí at um tú varðst skorin út úr olivintræinum sum er vilt av náttúru, og varðst gróðursettur ímóti náttúru inn í eitt gott olivintræ: hvør mikið meir skulu hesir, sum veri tær náttúrligu *greinarnar,* verða gróðursettir inn í sítt egna olivintræ?
25 Tí eg vildi ikki, bróður, at tit skuldu verið óvitandi um hetta loyndarmál, at ikki tit skuldu verið vísir í tykkar egnu metingum; at blindleiki partvíst er hendur fyri Ísrael, inntil Heidninganna fylling er komin inn.
26 Og so skal alt Ísrael verða frelst: eins og skrivað stendur, Út frá Sí˙-ón skal koma Útfríarin, og skal venda burt ógudiligleika frá Jákobi:
27 Tí at hesin *er* mín sáttmáli til teirra, tá ið eg skal taka burt teirra syndir.
28 Hvat gleðiboðskapinum viðvíkur, *eru teir* figgindar fyri tykkara sakir: men hvat útveljingina varðar, *eru teir* elskaðir fyri fedranna sakir.
29 Tí at Guðs gávur og kallan *eru* uttan iðran.
30 Tí at eins og tit í umlidnum tíðum hava ikki trúð Guði, tó nú hava lutast miskunn gjøgnum teirra vantrúgv:
31 Enntá soleiðis hava hesir eisini nú ikki trúð, at gjøgnum tykkara miskunn teir eisini mega lutast miskunn.

32 Tí at Guð hevur innilokað teir allar í vantrúgv, *fyri* at hann mátti hava miskunn yvir allar.

33 O tað dýpi av ríkdómunum, bæði av vísdómi og kunnleika Guðs! hvør órannsakiligir *eru* hansara dómar, og hansara vegir framum at finna útav!

34 Tí at hvør hevur kent huga Harrans? ella hvør hevur verið hansara ráðgevi?

35 Ella hvør hevur fyrst givið til hansara, og tað skal verða endurgoldið honum aftur?

36 Tí at av honum, og gjøgnum hann, og til hansara, *eru* øll ting: til hvørs *veri* dýrd um ævir. Á-měn.

KAPITUL 12

EG bøni tykkum tessvegna, brøður, við miskunnir Guðs, at tit bjóði fram tykkara likamˇ, eitt livandi sláturoffur, heilagt, Guði góðtakiligt, *sum er* tykkara skynsamliga tænasta.

2 Og verið ikki sammyndaðir við henda heim: men verðið tit ummyndaðir viðˆ endurnýggjan huga tykkara, at tit mega royna hvat *er* hasin góði, og góðtakiligi, og fullkomni, vilji Guðs.

3 Tí at eg sigi, gjøgnum ta náði givin mær, til hvønn mann sum er tykkara millum, ikki at hugsa *um seg sjálvan* meiri háleitt enn hann átti at hugsað; men at hugsa edrúiligani, samsvarandi við sum Guð hevur deilt til hvønn mann mátið av trúgv.

4 Tí at eins og vit hava mangar limir í ēinum likami, og allir limir hava ikki hina somu tænastu:

5 Soleiðis vit, *verandi* mangir, eru ēitt likam í Christi, og hvør *og* ēin limir hvør hjá øðrum.

6 Havandi tá gávur *sum eru* frábrigdandi, samsvarandi við ta náði sum er givin til okkara, hvørt prophet*agávu, tá latum okkum prophetera* samsvarandi við lutfallið av trúgv;

7 Ella tænastu, *tá latum okkum varta* um *okkara* tæning: ella hann ið frálærir, um frálæring;

8 Ella hann ið formanar, um formaning: hann ið gevur, *lat hann gera tað* við einfaldni; hann ið stjórnar, við ídni; hann ið sýnir miskunn, við gleði.

9 *Latið* kærleika veri uttan kávalæti. Havið andstygd fyri tí sum er ilt; haldið fast á tí sum er gott.

10 *Verið* blídligani alsknir hvør móti øðrum við bróðurligum kærleika; í heiðuri setandi hvør annan fremri;

11 Ikki latir í verki; brennandi í anda; tænandi Harranum;

12 Fagnandi í vón; tolnir í trongslu; haldandi áfram tráligani í bøn;

13 Deilandi út til neyðsynina hjá heilagum; givnir til gestablídnis.

14 Vælsignið teir sum søkja at tykkum: vælsignið, og bannið ikki.

15 Fegnist við teimum ið fegnast; og grátið við teimum ið gráta.

16 *Verið* av hinum sama sinni hvør móti øðrum. *Verið* ikki hugaðir *um* høgar lutir, men lækkið tykkum til manna av lágari støðu. Verið ikki vísir í tykkara egnu metanum.

17 Endurgjaldið ongum manni ilt fyri ilt. Siggið fyri lutum, ærligum í alra manna eygsjón.

18 Um tað veri møguligt, so mikið sum í tykkum liggur, livið friðsamligani við øllum monnum.

19 Kærliga elskaðu, hevnið ikki tykkum sjálvar, men *heldur* gevið vreiði*ni* rúm: tí at skrivað stendur, Hevnd*in er* mín; eg vil endurgjalda, sigur Harrin.

20 Tessvegna, um tín figgindi hungri, føð hann; um hann tyrsti, gev honum drekka: tí at í soleiðis *at* gera skalt tú hópa kolˇ av eldi á hans høvur.

21 Verð ikki vunnin yvir av illum, men vinn yvir illum við góðum.

KAPITUL 13

LAT hvørja sál vera undirgivna yvirfyri hinum hægru máttunum. Tí at til er eingin máttur, uttan frá Guði: teir máttir, ið veri *seg,* eru fyriskipaðir av Guði.

2 Hvørsumhelst *ið* tí stendur ímóti máttinum, stendur ímóti fyriskipan Guðs: og teir, sum standa ímóti, skulu móttaka til sín sjálvs heldøming.

3 Tí at stjórnarar eru ikki ein ræðsla hjá góðum verkum, men hjá teimum illu. Vilt tú tá ei vera ræddur fyri máttinum? ger tað sum er gott, og tú skalt hava prísan av hinum sama:

4 Tí at hann er tænari Guðs tær til góða. Men um tú geri hatta sum er ilt, ver ræddur; tí at hann ber ikki svørðið til einkiðs: tí at hann er tænari Guðs, ein hevnari at *útinna* vreiði uppá hann ið ger ilt.

5 Hvørsvegna *tit* mugu neyðugt vera undirgivnir, ikki einans fyri vreiði, men eisini fyri samvitsku skyld.

6 Tí fyri hesa grund gjalda tit íkast eisini: tí at teir eru tænarar Guðs, sinnandi støðugt sjálvum hesum sama tingi.

7 Rindið tí til alra *tað* teimum *er* skyldugt: íkast til hvørs íkast *er skyldugt,* toll til hvørs tollur; ótta til hvørs ótti; heiður til hvørs heiður.

8 Skyldið ongum manni nakað, uttan at elska hvør annan: tí at hann, ið elskar annan, hevur uppfylt lógina.

9 Tí at hetta, Tú skalt ikki fremja hordóm, Tú skalt ikki drepa, Tú skalt ikki stjala, Tú skalt ikki bera falskan vitnisburð, Tú skalt ikki girnast; og um *tað veri seg* nakað annað boð, tað verður í stuttum tikið samanum í hesi framsøgn, nevniliga, Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg.

10 Kærleiki virkar einkið ilt móti næsta sínum: tí *er* kærleiki uppfylling lógarinnar.

11 Og at, vitandi tíðina, at nú *er tað* tíð uppá at vakna úr svøvni: tí at nú *er* frelsa okkara nærri enn tá ið vit *fyrst* trúðu.

12 Náttin er langt liðin, dagurin er fyri hond: latum oss tí kasta av verk˘ myrkursins, og latum oss fara í herklæðir ljóssins.

13 Latum oss ganga ærligani, sum á deginum; ikki í veitsling og drykkjuskapi, ikki í hjásoving og leysalevnaði, ikki í klandri og øvundan.

14 Men íklæðist tit Harran Jesus Christ, og veitið ikki uppihald fyri kjøtið, til at *uppfylla tess* girndir.

KAPITUL 14

HONUM, sum er veikur í trúnni, takið tit ímóti, *men* ikki til ivasamar orðaskiftingar.

2 Tí at ēin trýr, at hann kann eta allar lutir: ein annar, sum er veikur, etur urtir.

3 Lat ikki hann sum etur, vanvirða hann sum ikki etur; og lat ikki hann sum ikki etur, døma hann sum etur: tí at Guð hevur tikið ímóti honum.

4 Hvør ert tú sum dømirt tænara annars mans? fyri sínum egna meistara stendur hann ella fellur. Ja, hann skal verða hildin uppi: tí at Guð er mentur at gera *at* hann stendur.

5 Ēin maður metir ēin dag hægri enn ein annan: ein annar metir hvønn dag *líka.* Lat hvønn mann vera til fulnar sannførdan í sínum egna huga.

6 Hann sum gevur far um dagin, gevur far um *hann* yvirfyri Harranum; og hann sum gevur ikki far um dagin, fyri Harranum gevur hann ikki far um *hann.* Hann ið etur, etur fyri Harranum, tí at hann veitir Guði tøkkir; og hann ið etur ikki, fyri

Harranum etur hann ikki, og veitir Guði tøkkir.

7 Tí at eingin av okkum livir fyri sær sjálvum, og eingin maður doyr fyri sær sjálvum.

8 Tí at hvørt vit liva, liva vit Harranum; og hvørt vit doyggja, doyggja vit Harranum: hvørt vit tí liva ella doyggja, eru vit Harrans.

9 Tí at til hetta endamál Christus bæði doyði, og reis, og livnaði aftur, at hann mátti vera Harri bæði teirra deyðu og livandi.

10 Men hví dømirt tú bróðir tín? ella hví gert tú bróðir tín til einkiðs? tí at vit skulu allir standa frammi fyri dómstóli Christs.

11 Tí at skrivað stendur, *Sum* eg livi, sigur Harrin, hvørt knæ skal boyggjast fyri mær, og hvør tunga skal játta til Guðs.

12 So skal tá hvør *og* ēin av okkum geva roknskap fyri seg sjálvan til Guðs.

13 Latum okkum tí ikki døma hvør annan longur: men dømið heldur hetta, at eingin maður seti ein snávingarstein ella eitt føri til at falla á veg bróðurs *síns*.

14 Eg veit, og eri sannførdur av Harranum Jesusi, at *tað er* einkið óreint av sær sjálvum: men fyri honum sum metir nakað ting at vera óreint, fyri honum *er tað* óreint.

15 Men um bróðir tín verði nívdur við mati *tínum,* nú gongurt tú ikki vælvildarliga. Oyðilegg ikki hann við tínum mati, fyri hvønn Christus doyði.

16 Latið tá ikki tykkara góða verða ilt talað um:

17 Tí at kongadømi Guðs er ikki matur og drekka; men rættvísi, og friður, og gleði í Halga Andanum.

18 Tí at hann, sum í hesum tingum tænir Christi, *er* góðtakiligur fyri Guði, og viðurkendur av monnum.

19 Latum okkum tí fylgja eftir teimum tingum sum fremja frið, og tingum, við hvørjum ēin kann uppbyggja ein annan.

20 Fyri mat oyðilegg ikki verk Guðs. Øll ting víst *eru* skír; men *tað er* ilt fyri tí manni sum etur við meinboga.

21 *Tað er* gott hvørki at eta kjøt, ella at drekka vín, ella *nakað ting*, við hvørjum bróðir tín snávar, ella fær meinboga, ella verður gjørdur veikur.

22 Hevurt tú trúgv? hav *hana* hjá tær sjálvum frammi fyri Guði. Glaður *er* hann ið fordømir ikki seg sjálvan í tí tinginum sum hann viðurkennir.

23 Og hann sum ivast, er heldømdur um hann eti, av tí at *hann etur* ikki av trúgv: tí at hvatsumhelst *ið er* ikki av trúgv, er synd.

KAPITUL 15

VIT, sum eru sterkir, áttu tá at bera veikleikarnar hjá teimum veiku, og ikki at gera okkum sjálvum til vildar.

2 Lat ēin og hvønn av okkum gera næsta *sínum* til vildar fyri *hansara* góða til uppbyggingar.

3 Tí at sjálvt Christus gjørdi ikki sær sjálvum til vildar; men, sum skrivað stendur, Háðanir teirra, sum háðaðu teg, fullu á meg.

4 Tí at hvørjisumhelst ting *ið* vórðu skrivaði frammanundan, vórðu skrivaði fyri okkara læring, at vit, gjøgnum tolmóð og troyst av skriftunum, máttu hava vón.

5 Nú, Guð tolmóðar og ugganar veiti tykkum at vera líkasinnaðar hvør móti øðrum, samsvarandi við Christ Jesus:

6 At tit mega við ēinum huga *og* ēinum munni dýrðmeta Guð, enntá Faðir várs Harra Jesu Christs.

7 Hvørsvegna takið tit ímóti hvør øðrum, eins og Christus eisini tók ímóti okkum til dýrdar Guðs.

8 Nú, eg sigi, at Jesus Christus var ein tænari hjá umskeringini fyri sannleika Guðs, at staðfesta fyrijáttanirnar, *gjørdar* fedrunum:
9 Og at Heidningarnir máttu dýrðmeta Guð fyri miskunn *hans;* eins og skrivað stendur, Fyri hesa grund vil eg játta til tín millum Heidninganna, og syngja navni tínum.
10 Og aftur sigur hann, Fegnist, tit Heidningar, við fólki hans.
11 Og aftur, Prísið Harranum, allir tit Heidningar; og lovið honum, øll tit fólk.
12 Og aftur sigur Ê-sâĭ´-ăs, Vera skal ein rót av Ísai, og hann sum skal rísa til at ráða yvir Heidningunum; á hann skulu Heidningarnir troysta.
13 Nú, Guð vónarinnar fylli tykkum við allari gleði og friði í at trúgva, at tit mega vera ríkiligir í vón, gjøgnum kraft Halga Andans.
14 Og eg sjálvur eisini eri sannførdur um tykkum, brøður mínir, at tit eisini eru fullir av góðsku, fyltir við øllum kunnleika, førir fyri eisini at áminna hvør annan.
15 Hóast hetta, brøður, eg havi skrivað tað meiri djarvliga til tykkara í onkrum føri, sum leggjandi tykkum í huga, uppá grund av teirri náði sum er givin til mín av Guði,
16 At eg skuldi vera tænari Jesu Christs til Heidninganna, tænandi gleðiboðskap Guðs, at ofringin upp av Heidningunum mátti vera góðtakilig, verðandi halgað av Halga Andanum.
17 Eg havi tessvegna av hvørjum eg kann rósa *mær,* gjøgnum Jesus Christ, í teimum tingum ið viðvíkja Guði.
18 Tí at eg vil ikki vága *mær* at tala um nøkur av teim tingunum sum Christus hevur ikki virkað við^ mær, til at gera Heidningarnar lýdnar, við^ orði og gerð,
19 Gjøgnum mektig tekin^ og undur^, við^ kraft Anda Guðs; so at frá Jerusalem, og runt umkring at Ĭl-lўr´ĭ-cŭm, havi eg til fulnar prædikað gleðiboðskap Christs.
20 Ja, soleiðis havi eg strevað at prædika gleðiboðskapin, ikki har *sum* Christus var nevndur, at ikki eg skuldi byggja uppá grundvøll annars mans:
21 Men sum skrivað stendur, Til hvørja hann var ikki talaður um, teir skulu síggja: og teir, sum ei hava hoyrt, skulu skilja.
22 Fyri hvørja grund eg eisini havi verið nógv hindraður frá at komið til tykkara.
23 Men nú, havandi einkið meira pláss í hesum pørtunum, og havandi mikla trá hesi mongu ár at koma til tykkara;
24 Nærsumhelst *ið* eg taki mína ferð inn í Spániu, vil eg koma til tykkara: tí at eg líti á at síggja tykkum á míni ferð, og at verða førdur á míni leið hagarmót av tykkum, um fyrst eg verði eitthvørt fyltur við tykkara *samlagi.*
25 Men nú fari eg til Jerusalem at tæna teimum heilagu.
26 Tí at tað hevur líkað teimum úr Măc-ĕ-dŏ´-nĭ-ŭ og Â-chăĭ´-ŭ at gera eitt ávíst tilskot til tey fátæku heilagu sum eru í Jerusalem.
27 Tað hevur líkað teimum sanniliga; og teirra skuldnarar teir eru. Tí at um Heidningarnir hava verðið gjørdir luttakarar í teirra andligu tingum, er teirra skylda eisini at tæna teimum í tímiligum tingum.
28 Tá ið tí eg havi útint hetta, og havi innsiglað henda ávøkst til teirra, vil eg koma um tykkum inn í Spániu.
29 Og eg eri vísur í, at tá ið eg komi til tykkara, skal eg koma í fyllingini av signingini av gleðiboðskapi Christs.
30 Nú, eg bøni tykkum, brøður, fyri Harrans Jesu Christī skyld, og fyri kærleika Andans, at tit stríði

saman við mær í *tykkara* bønum til Guðs fyri mær;
31 At eg má verða útfríaður frá teimum sum ikki trúgva í Judæu; og at mín tænasta, sum *eg havi* til Jerusalem, má verða góðtikin av teimum heilagu;
32 At eg má koma til tykkara við gleði við^ vilja Guðs, og má við tykkum verða endurfrískaður.
33 Nú, Guð friðarins *veri* við tykkum øllum. Á´-mën.

KAPITUL 16

EG gevi Phø´-bê, systur okkara, viðmæli at tykkum, sum er ein tænarinna hjá kirkjuni sum er í Cën-chrë´-ũ:
2 At tit taki ímóti henni í Harranum, eins og sømir heilagum, og at tit dugni henni í hvørjumsumhelst viðurskiftum *ið* hon hevur tørv á av tykkum: tí at hon hevur verið ein hjálpari av mongum, og av mær sjálvum eisini.
3 Heilsið Prisçillu og Ă-quĭ´-lăs-i, mínum hjálparum í Christi Jesusi:
4 Hvørji fyri mítt lív hava lagt niður sínar egnu hálsar: hvørjum ikki einans eg veiti tøkkir, men eisini allar kirkjur Heidninganna.
5 Líkaleiðis *heilsið* kirkjuni sum er í húsi teirra. Heilsið mínum vælelskaða Ep-æ-në´-tũs-i, sum er frumávøksturin av Â-chaĭ´-ũ til Christs.
6 Heilsið Mariu, sum veitti mikið arbeiði á okkum.
7 Heilsið Ăn-drŏ-nĭ´-cŭs-i og Juniasi, skyldmonnum mínum, og mínum samfongum, sum eru hátt í metum millum ápostlanna, sum eisini vóru í Christi áðrenn eg.
8 Heilsið Ăm´-plĭ-ăs-i, háttelskaða mínum í Harranum.
9 Heilsið Ũr-bā´-nũs-i, okkara hjálpara í Christi, og Stăch´-ys-i, mínum háttelskaða.
10 Heilsið Ă-pĕl´-lës-i, fullroyndum í Christi. Heilsið teimum sum eru av *húshaldi* Ă-rĭs-tŏ´-bũlũs-ar.
11 Heilsið Hĕ-ró´-dĭ-ŏn-i, skyldmanni mínum. Heilsið teimum sum veri av *húshaldi* Når-cĭs´-sũsar, sum eru í Harranum.
12 Heilsið Trŷ-phĕ´-nũ og Trŷphŏ´-sũ, sum arbeiða í Harranum. Heilsið háttelskaða Persisi, sum strevaði nógv í Harranum.
13 Heilsið Rufusi, útvaldum í Harranum, og hansara móður og míni.
14 Heilsið Ă-sўn-crĭ´-tũs-i, Phlĕ´-gŏn-i, Hĕr´-măs-i, Păt-rŏ´-băs-i, Hĕr´-mës-i, og brøðrunum sum eru hjá teimum.
15 Heilsið Phĭ-lô-lŏ´-gŭs-i, og Juliu, Nĕ´-reus-i, og systur hansara, og Ô-lўm´-păs-i; og øllum teimum heilagu sum eru hjá teimum.
16 Heilsið hvør øðrum við einum heilagum kossi. Christī kirkjur lata heilsa tykkum.
17 Nú, eg bøni tykkum, brøður, merkið *tykkum* teir sum valda sundurdeilingar og meinbogar, mótsatt við Guðslæruna sum tit hava lært; og skýggið teir.
18 Tí at teir, sum eru slíkir, tæna ikki Harra várum Jesusi Christi, men sínum egna búki; og við^ góðum orðum og føgrum talum villleiða *teir* hjørtu teirra einføldu.
19 Tí at tykkara lýdni er komið útumkring til alra *manna*. Eg eri tí glaður tykkara vegna: men tó vildi eg havt tykkum vísar yvirfyri tí sum er gott, og einfaldar viðvíkjandi illum.
20 Og Guð friðarins skal knúsa Satan undir tykkara fótum fljótliga. Náði várs Harra Jesu Christs *veri* við tykkum. Á´-mën.
21 Timotheus, mín starvsfelagi; og Lũ´-çĭ-ũs, og Jā´-sŏn, og Sô-sĭp´-ă-tĕr, mínir skyldmenn, lata heilsa tykkum.
22 Eg, Tĕr´-tĭ-ŭs, sum skrivaði *hendan* epistilin, lati heilsa tykkum í Harranum.
23 Gaĭ´-ũs, húsvertur mín, og hjá allari kirkjuni, letur heilsa tykk-

um. Ê-răs´-tŭs, roknskaparstjóri staðarins, letur heilsa tykkum; og Quartus, ein bróðir.

24 Náði várs Harra Jesu Christs *veri* við tykkum øllum. Á´-měn.

25 Nú, til hansara sum er við kraft til at grundfesta tykkum samsvarandi við gleðiboðskap mín, og prædikanina av Jesusi Christi, samsvarandi við opinberingina av loyndardóminum, sum varð hildin loyndur síðan veraldin byrjaði,

26 Men nú er gjørdur eyðsýndur, og viðˆ skriftum prophetanna, samsvarandi við boð hins ævigtvarandi Guðs, gjørdur kunnur fyri øllum tjóðum til lýdnis trúarinnar:

27 Til Guðs eina vísa, *veri* dýrd gjøgnum Jesus Christ um ævir. Á´-měn.

¶ Skrivaður til Rómverjanna frá Cô-rĭn´-thŭs, *og sendur* viðˆ Phœ´-bê, tænara hjá kirkjuni í Cĕn-chrĕ´-ū.

HIN FYRRI
EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS
TIL
CORINTHARANNA.

KAPITUL 1

PAULUS, kallaður *til at vera* ein ápostul Jesu Christs, gjøgnum vilja Guðs, og Sŏs´-thênēs, bróðir *okkara,*

2 Til kirkju Guðs sum er í Corinth, til teirra sum eru halgaðir í Christi Jesusi, kallaðir *til at vera* heilagir, við øllum sum á hvørjum staði kalla á navn Jesu Christs Harra várs, bæði teirra og okkara:

3 Náði *veri* at tykkum, og friður, frá Guði Faðir várum, og *frá* Harranum Jesusi Christi.

4 Eg takki Guði mínum altíð tykkara vegna, fyri ta Guðs náði, sum er givin tykkum viðˆ Jesusi Christi;

5 At í øllum tingum tit eru ríkaðir av honum, í allari mælsku, og *í* øllum kunnleika;

6 Enntá sum Christi vitnisburður varð staðfestur í tykkum:

7 Soleiðis at tit koma aftanfyri í ongari gávu, bíðandi eftir komu várs Harra Jesu Christs:

8 Hvør skal eisini støðufesta tykkum *fram*at endanum, *at tit mega vera* ólastandi á degi várs Harra Jesu Christs.

9 Guð *er* trúfastur, av hvørjum tit vórðu kallaðir inn í samfelag Sonar hansara Jesu Christs Harra várs.

10 Nú, eg trábiði tykkum, brøður, við navn várs Harra Jesu Christs, at tit allir tali hin sama lut, og *at* tað verði ongar sundurdeilingar tykkara millum; men *at* tit verði fullkomiliga sameindir í hinum sama huga og í hini somu døming.

11 Tí at tað er vorðið kunngjørt mær um tykkum, brøður mínir, av teimum *ið eru av húsi* Chlō´-ê, at tað eru klandringar tykkara millum.

12 Nú, hetta sigi eg, at hvør *og* ēin av tykkum sigur, Eg eri av Paulusi; og eg av Á-pŏl´-lōs-i; og eg av Cē´-phăs-i; og eg av Christi.

13 Er Christus sundurdeildur? varð Paulus krossfestur fyri tykkum? ella vórðu tit doyptir í navni Paulusar?

14 Eg takki Guði, at eg doypti ongan av tykkum, uttan Crĭs´-pŭs og Gâĭ´-ŭs;

15 At ikki nakar skuldi siga, at eg hevði doypt í mínum egna navni.

16 Og eg doypti eisini húshald

Stēph´-ăn-ăs-ar: umframt *tað,* veit eg ikki hvørt eg doypti nakran annan.

17 Tí at Christus sendi meg ikki at doypa, men at prædika gleðiboðskapin: ikki við orðavísdómi, at ikki Christi krossur skuldi verða gjørdur av ongari virkni.

18 Tí at krossar-prædikanin er fyri teimum, ið glatast, dárskapur; men okkum, sum eru frelstir, er hon kraft Guðs.

19 Tí at skrivað stendur, Eg vil oyða vísdóm teirra vísu, og vil gera til einkiðs vísdóm teirra vitru.

20 Hvar *er* hin vísi? hvar *er* hin skriftlærdi? hvar *er* keglari hesa heims? hevur ikki Guð gjørt fávitskutan vísdóm hesa heims?

21 Tí at eftir at í vísdómi Guðs, heimurin viðˆ vísdómi kendi ikki Guð, líkaði tað Guði, viðˆ prædikanar-dárskapinum at frelsa tey sum trúgva.

22 Tí at Jødarnir krevja eitt tekin, og Grikkarnir søkja eftir vísdómi:

23 Men vit prædika Christ krossfestan, Jødunum snávingarsteinur, og Grikkunum fávitska;

24 Men teimum ið eru kallaðir, bæði Jødum og Grikkum, Christ — Guðs kraft, og Guðs vísdóm.

25 Tí at fávitska Guðs er vísari enn menn; og veikleiki Guðs er sterkari enn menn.

26 Tí at tit síggja tykkara kallan, brøður, hvussu ið ikki mangir vísir menn eftir kjøtinum, ikki mangir mektigir, ikki mangir tignarligir, *eru kallaðir:*

27 Men Guð hevur útvalt hinar fávitskutu lutir heimsins *fyri* at fjamska hinar vísu; og Guð hevur útvalt hinar veiku lutir heimsins *fyri* at fjamska teir lutir sum eru mektigir;

28 Og niðarligu lutir heimsins, og lutir sum eru vanvirdir, hevur Guð útvalt, *ja,* og lutir sum eru ei, at gera til einkiðs lutir sum eru:

29 Til *tess* at einkið kjøt skuldi rósa *sær* í hansara nærveru.

30 Men av honum eru tit í Christi Jesusi, sumᵖ av Guði er gjørdur okkum vísdómur, og rættvísi, og halgan, og endurloysing:

31 *Fyri* at, samsvarandi sum skrivað stendur, Hann, sum rósar *sær,* lat hann rósa *sær* í Harranum.

KAPITUL 2

OG eg, brøður, tá ið eg kom til tykkara, kom ikki við avbærleika av talu ella av vísdómi, kunngerandi tykkum Guðs vitnisburð.

2 Tí at eg ráddi av, ikki at vita nakað ting tykkara millum, uttan Jesus Christ, og hann krossfestan.

3 Og eg var hjá tykkum í veikleika, og í ótta, og í miklari bivan.

4 Og mín tala og mín prædikan *var* ikki við tølandi orðum av vísdómi mans, men í sannvísing av Andanum og av kraft:

5 At tykkara trúgv skuldi ikki standa í mannavísdómi, men í Guðs kraft.

6 Hvussu enn er, vit tala vísdóm millum teirra sum eru fullkomnir: tó ikki vísdóm hesa heims, ella hjá prinsum hesa heims, sum koma til einkiðs:

7 Men vit tala vísdóm Guðs í einum loyndardómi, *enntá* hin fjalda *vísdóm,* hvønn Guð fyriskipaði áðrenn verøldina okkum til dýrdar:

8 Hvønn eingir av prinsum hesa heims kendu: tí at høvdu teir kent *hann,* vildu teir ikki havt krossfest Harra dýrdarinnar.

9 Men eins og skrivað stendur, Eyga hevur ikki sæð, ella oyra hoyrt, eiheldur hava komið inn í hjarta mans, teir lutir sum Guð hevur fyribúgvið til teirra sum elska hann.

10 Men Guð hevur opinberað okkum *teir* viðˆ Anda sínum: tí at Andin rannsakar allar lutir, ja, hinar djúpu lutir Guðs.

11 Tí at hvør maður kennir lutir mans, uttan andi mans sum er í honum? enntá soleiðis lutir Guðs kennir eingin maður, uttan Andi Guðs.

12 Nú, vit hava fingið, ikki anda heimsins, men andan sum er av Guði; at vit máttu kenna teir lutir sum eru frítt givnir til okkara av Guði.

13 Hvørjar lutir eisini vit tala, ikki í orðunum sum vísdómur mans lærir, men sum Halgi Andin lærir; berandi saman andligar lutir við andligar.

14 Men hin náttúrligi maðurin tekur ikki við lutunum av Anda Guðs: tí at teir eru honum fávitska: eiheldur kann hann kenna *teir,* tí at teir eru andliga greinaðir.

15 Men hann, sum er andligur, dømir allar lutir, tó verður sjálvur hann dømdur av ongum manni.

16 Tí at hvør hevur kent hug Harrans, at hann kann undirvísa honum? Men vit hava hug Christs.

KAPITUL 3

OG eg, brøður, kundi ikki tala við tykkum sum við andligar, men sum við kjøtligar, *enntá* sum við pinkubørn í Christi.

2 Eg havi føtt tykkum við mjólk, og ikki við kjøti: tí at higartil vóru tit ikki mentir *at bera tað,* eiheldur enn nú eru tit mentir.

3 Tí at tit eru enn kjøtligir: tí at hvar ið *tað er* tykkara millum øvundan, og stríð, og sundurdeilingar, eru tit ikki kjøtligir, og ganga sum menn?

4 Tí at meðan ēin sigur, Eg eri av Paulusi; og ein annar, Eg *eri* av Ă-pŏl′-lōs-i; eru tit ikki kjøtligir?

5 Hvør er tá Paulus, og hvør *er* Ă-pŏl′-lōs, uttan tænarar, av hvørjum tit trúðu, enntá sum Harrin gav til hvønn mann?

6 Eg havi sett niður, Ă-pŏl′-lōs vætti; men Guð gav vøksturin.

7 So er tá hvørki hann, sum setur niður, nakað, ella hann sum vætir; men Guð sum gevur vøksturin.

8 Nú, hann, sum setur niður, og hann, sum vætir, eru ēitt: og hvør maður skal fáa sítt egna endurgjald, samsvarandi við sítt egna arbeiði.

9 Tí at vit eru arbeiðarar saman við Guði: tit eru Guðs akurlendi, *tit eru* Guðs bygningur.

10 Samsvarandi við ta náði Guðs, sum mær er givin, sum ein vísur byggimeistari, havi eg lagt grundvøllin, og ein annar byggir hará. Men lat hvønn mann geva gætur eftir, hvussu hann byggir haruppá.

11 Tí at annan grundvøll kann eingin maður leggja, enn ið lagdur er, sum er Jesus Christus.

12 Nú, um nakar maður byggi uppá henda grundvøll gull, silvur, dýrabærar steinar, træ, hoyggj, hálm;

13 *Tá* skal verkið hjá hvørjum manni verða gjørt eyðsýnt: tí at dagurin skal klárleggja tað, av tí at hann skal verða opinberaður við eldi; og eldurin skal royna verkið hjá hvørjum manni, av hvørjum slagi tað er.

14 Um verkið hjá nøkrum manni verði *verandi,* sum hann hevur bygt haruppá, *tá* skal hann fáa eitt endurgjald.

15 Um verkið hjá nøkrum manni skal verða brent, *tá* skal hann líða tap: men sjálvur hann skal verða frelstur; tó sum við eldi.

16 Vita tit ikki, at tit eru Guðs tempul, og *at* Andi Guðs býr í tykkum?

17 Um nakar maður dálki Guðs tempul, hann skal Guð oyða; tí at Guðs tempul er heilagt, hvørt *tempul* tit eru.

18 Lat ongan mann villleiða seg sjálvan. Um nakar maður tykkara millum tykist at vera vísur í hesi verøld, lat hann gerast ein dári, at hann má verða vísur.

19 Tí at vísdómurin hjá hesum heimi er dárskapur hjá Guði. Tí at skrivað stendur, Hann tekur hinar vísu í teirra egnu snúinsemi.
20 Og aftur, Harrin kennir hugsanirnar hjá teimum vísu, at tær eru fáfongdar.
21 Tessvegna, lat ongan mann rósa *sær* í monnum. Tí at øll ting eru tykkara;
22 Hvørt Paulus, ella Ă-pöl´-lös, ella Cē´-phăs, ella verøldin, ella lív, ella deyði, ella ting núverandi; ella ting, sum koma skulu; øll eru tykkara;
23 Og tit eru Christs; og Christus *er* Guðs.

KAPITUL 4

LAT ein mann soleiðis rokna um okkum, sum um tænarar Christs, og umsjónarmenn yvir Guðs loyndardómum.
2 Harafturat verður tað kravt av umsjónarmonnum, at ein maður verði funnin trúfastur.
3 Men hjá mær er tað eitt ógvuliga lítið ting, at eg skuldi verðið dømdur av tykkum, ella av dómi manna: ja, eg dømi ikki meg sjálvan.
4 Tí at eg veit einkið við mær sjálvum; tó eri eg ikki hervið rættvísgjørdur: men hann, sum dømir meg, er Harrin.
5 Tessvegna, dømið einkið áðrenn tíðina, inntil Harrin komi, hvør bæði vil leiða til ljóss hinar fjaldu lutirnar av myrkri, og vil gera eyðsýnd ráðini hjá hjørtunum: og tá skal hvør maður hava prís av Guði.
6 Og hesi ting, brøður, havi eg í eini mynd fört yvir á meg sjálvan og *á* Ă-pöl´-lös fyri tykkara sakir; at tit máttu læra í okkum ikki at hugsa *um menn* uppum tað sum skrivað stendur, at eingin av tykkum verði uppblásin fyri ēinum ímóti øðrum.
7 Tí at hvør fær teg at líkjast *frá einum øðrum?* og hvat hevurt tú, sum tú ikki fekst? nú, um tú fekst *tað,* hví rósart tú *tær,* sum um tú hevðirt ikki fingið *tað?*
8 Nú eru tit mettir, nú eru tit ríkir, tit hava rátt sum kongar uttan okkum: og eg vildi til Guðs, *at* tit ráddu, at vit eisini máttu rátt við tykkum.
9 Tí at mær tykir, at Guð hevur framsett okkum ápostlarnar aftastar, sum var tað tilnevndar til deyða: tí at vit eru gjørdir heiminum ein skuggsjón, og fyri einglum, og fyri monnum.
10 Vit *eru* dárar fyri Christī skyld, men tit *eru* vísir í Christi; vit *eru* veikir, men tit *eru* sterkir; tit *eru* ærumiklir, men vit *eru* vanvirdir.
11 Alt at hesi núverandi stund, vit bæði hungra, og tyrsta, og eru naknir, og verða bardir, og hava ongan ávísan bústað;
12 Og arbeiða, virkandi við okkara egnu hondum: verðandi háðaðir, vit vælsigna; verðandi atsøktir, vit tola tað:
13 Verðandi útspiltir, vit bøna: vit eru gjørdir sum skittur heimsins, *og eru* útskotið av øllum tingum *fram*at hesum degi.
14 Eg skrivi ikki hesi ting *fyri* at skamma tykkum, men sum mínar háttelskaðu synir eg ávari *tykkum.*
15 Tí at tó *at* tit havi tíggju túsund undirvísarar í Christi, tó *hava tit* ikki mangar fedrar: tí at í Christi Jesusi havi eg gitið tykkum gjøgn gleðiboðskapin.
16 Hvørsvegna eg trábiði tykkum, verið tit eftirfylgjarar av mær.
17 Fyri hesa grund havi eg sent til tykkara Timotheus, sum er mín háttelskaði sonur, og trúfastur í Harranum, sum skal føra tykkum inn í endurminning um mínar vegir sum veri í Christi, *so* sum eg frálæri allar staðir í hvørji kirkju.
18 Nú, summir eru uppblásnir, sum um eg vildi ikki komið til tykkara.

19 Men eg vil koma til tykkara fljótligani, um Harrin vilji, og vil kenna, ikki taluna hjá teimum ið eru uppblásnir, men kraftina.
20 Tí at kongadømi Guðs *er* ikki í orði, men í kraft.
21 Hvat vilja tit? skal eg koma til tykkara við einum *fleingju*stavi, ella í kærleika, og *í* anda eyðmjúkleikans?

KAPITUL 5

TAÐ verður javnan fráboðað, *at tað finst* siðloysi tykkara millum, og slíkt siðloysi sum verður ikki so mikið sum nevnt Heidninganna millum, at ēin skuldi havt ektakonu faðirs síns.
2 Og tit eru uppblásnir, og hava ikki tíansheldur harmast, at hann, sum hevur gjørt hesa gerð, mátti verðið tikin burtur tykkara millum ífrá.
3 Tí at eg sanniliga, sum fráverandi í likami, men hjáverandi í anda, havi dømt longu, sum um eg var hjáverandi, *viðvikjandi* honum sum hevur soleiðis gjørt hesa gerð,
4 Í navni várs Harra Jesu Christs, tá ið tit eru savnaðir saman, og andi mín, við kraft várs Harra Jesu Christs,
5 At geva upp ein slíkan til Satans til oyðileggingina av kjøtinum, at andin má verða frelstur á degi Harrans Jesu.
6 Tykkara rósan *er* ikki góð. Vita tit ikki, at eitt sindur *av* súrdeiggi súrgar allan klumpin?
7 Reinskið út, tessvegna, tað gamla súrdeiggið, at tit mega verða nýggjur klumpur, eins og tit eru ósúrgaðir. Tí at enntá Christus — umleyp okkara — er sláturofraður fyri okkum:
8 Latum okkum tí halda hátíðina, ikki við gomlum súrdeiggi, eiheldur við súrdeiggi illvilja og vondsku; men við hinum ósúrgaða *breyði* ærligleiks og sannleiks.
9 Eg skrivaði tykkum í einum epistli, ikki at samlagast við siðloysingar:
10 Tó ikki samanumtikið við siðloysingar hesa heims, ella við hinar gírigu, ella peninganoyðarar, ella við avgudadýrkarar; tí at tá høvdu tit noyðst *at* farið út úr heiminum.
11 Men nú havi eg skrivað tykkum ikki at halda samlag, um nakar maður, sum er kallaður ein bróðir, veri ein siðloysingur, ella gírigur, ella ein avgudadýrkari, ella ein illmælismaður, ella ein drykkjumaður, ella ein peninganoyðari; við einum slíkum, nei, ikki at eta.
12 Tí at hvat havi eg at gera *við* at døma teir eisini sum eru uttanfyri? døma ikki tit teir sum eru innanfyri?
13 Men teir, sum eru uttanfyri, dømir Guð. Tessvegna, beinið burtur tykkara millum ífrá handa vonda persón.

KAPITUL 6

VÁGI nakar av tykkum, havandi eina søk ímóti einum øðrum, fara í rættin frammi fyri hinum órættvísu, og ikki frammi fyri hinum heilagu?
2 Vita tit ikki, at hinir heilagu skulu døma heimin? og um heimurin skal verða dømdur av tykkum, eru tit óverdigir at døma hinar minstu sakir?
3 Vita tit ikki, at vit skulu døma einglar? hvør mikið meira ting sum tilhoyra hesum lívi?
4 Um tit tá hava dómar um ting˘, tilhoyrandi hesum lívi, setið teir at døma sum eru minst umhildnir í kirkjuni.
5 Eg tali tykkum til skammar. Er tað so, at tað er ikki ein vísur maður tykkara millum? nei, ikki ēin sum skal vera førur fyri at døma ímillum brøður sínar?
6 Men bróðir fer í rættin við

bróðuri, og tað frammi fyri teimum vantrúgvandi.

7 Nú, tí er tað aldeilis ein feilur tykkara millum, av tí at tit fara í rættin hvør við øðrum. Hví taka tit ikki heldur órætt? hví *loyva* tit ikki heldur *tykkum sjálvar at* verða sviknar?

8 Nei, tit gera órætt, og svíkja, og tað *tykkara* bróður.

9 Vita tit ikki, at hinir órættvísu skulu ikki arva kongadømi Guðs? verðið ikki villleiddir: hvørki siðloysingar, ella avgudadýrkarar, ella hordómsfremjarar, ella kvinnulátigir, ella misbrúkarar av sær sjálvum við mannkyni,

10 Ella tjóvar, ella gírigir, ella drykkjumenn, ella illmælismenn, ella peninganoyðarar, skulu arva kongadømi Guðs.

11 Og slíkir vóru summir av tykkum: men tit eru tváaðir, men tit eru halgaðir, men tit eru rættvísgjørdir í navni Harrans Jesu, og við^ Anda Guðs várs.

12 Øll ting eru lóglig at mær, men øll ting eru ikki gagnlig: øll ting eru lóglig hjá mær, men eg vil ikki verða førdur undir máttin av nøkrum.

13 Matir fyri búkin, og búkurin fyri matir: men Guð skal oyða bæði hann og teir. Nú, likamið *er* ikki fyri siðloysi, men fyri Harran; og Harrin fyri likamið.

14 Og Guð hevur bæði reist upp Harran, og vil eisini reisa upp okkum við^ síni egnu kraft.

15 Vita tit ikki, at tykkara likam eru limir Christs? skal eg tá taka limir Christs, og gera *teir til* limirnar hjá eini skøkju? Guð sýti *fyri*.

16 Hvat? vita tit ikki, at hann, sum er sambundin til eina skøkju, er ēitt likam? tí at tvey, sigur hann, skulu verða ēitt kjøt.

17 Men hann, sum er sambundin at Harranum, er ēin andi.

18 Flýggið siðloysi. Hvør synd, sum ein maður ger, er uttanfyri likamið; men hann, sum fremur siðloysi, syndar ímóti sínum egna likami.

19 Hvat? vita tit ikki, at tykkara likam er tempul Halga Andans, *sum er* í tykkum, sum tit hava av Guði, og tit eru ikki tykkar egnu?

20 Tí at tit eru keyptir við einum virði: tessvegna dýrðmetið Guð í tykkara likami, og í tykkara anda, sum eru Guðs.

KAPITUL 7

NÚ, viðvíkjandi tingunum, um hvørji tit skrivaðu til mín: *Tað er* gott fyri ein mann ikki at nema við eina kvinnu.

2 Hóast tað, *fyri at skýggja* siðloysi, havi hvør maður sína egnu ektakonu, og havi hvør kvinna sín egna ektamann.

3 Ektamaðurin veiti ektakonuni skyldiga góðvild: og líkaleiðis eisini ektakonan ektamanninum.

4 Ektakonan hevur ikki mátt egna likams síns, men ektamaðurin: og somuleiðis eisini hevur ektamaðurin ikki mátt egna likams síns, men ektakonan.

5 Svíkið tit ikki hvørt annað, uttan *tað veri* við samtykki í eina tíð, at tit mega geva tykkum sjálv til føstu og bønar; og komið saman aftur, at Satan freisti tykkum ikki fyri tykkara ófráhaldni.

6 Men eg tali hetta við^ loyvi, *og* ikki av boði.

7 Tí at eg vildi, at allir menn vóru enntá sum eg sjálvur. Men hvør maður hevur sína egnu gávu av Guði, ēin eftir hesum háttarlagi, og ein annar eftir hasum.

8 Eg sigi tí til hinar ógiftu og einkjur, Tað er gott fyri tey, um tey verði *verandi* enntá sum eg.

9 Men um tey kunnu ikki halda *sær*, lat tey giftast: tí at tað er betri at giftast, enn at brenna.

10 Og teimum giftu bjóði eg, *tó* ikki eg, men Harrin, Lat ikki

ektakonuna fara avstað frá ektamanni *sínum:*

11 Men og um hon fari avstað, lat hana verða verandi ógift, ella verða endursónað til ektamans *síns:* og lat ikki ektamannin koyra burt ektakonu *sína*.

12 Men til restina tali eg, ikki Harrin: Um nakar bróðir hevur eina ektakonu sum trýr ikki, og hon veri *seg* nøgd at dvøljast við honum, lat hann ikki koyra hana burtur.

13 Og kvinnan, sum hevur ein ektamann sum trýr ikki, og um hann veri *seg* nøgdur at dvøljast við henni, lat hana ikki fara frá honum.

14 Tí at hin vantrúgvandi ektamaðurin er halgaður av ektakonuni, og hin vantrúgvandi ektakonan er halgað av ektamanninum: annars vóru børn tykkara órein; men nú eru tey heilag.

15 Men um hin vantrúgvandi fari avstað, lat hann fara avstað. Ein bróðir ella ein systir er ikki undir trældómi í slíkum *førum:* men Guð hevur kallað okkum til friðar.

16 Tí at hvat veitst tú, O ektakona, hvørt tú skalt frelsa ektamann *tín?* ella hvussu veitst tú, O maður, hvørt tú skalt frelsa ektakonu *tína?*

17 Men sum Guð hevur deilt út til hvønn mann, sum Harrin hevur kallað hvønn *og* ēin, soleiðis lat hann ganga. Og soleiðis fyriskipi eg í øllum kirkjum.

18 Er nakar maður kallaður, verandi umskorin? lat hann ei gerast óumskorin. Er nakar kallaður í óumskering? lat hann ei verða umskorin.

19 Umskering er einkið, og óumskering er einkið, men haldanin av boðum Guðs.

20 Lat hvønn mann verða *verandi* í hini somu kallan, í hvørji hann varð kallaður.

21 Ert tú kallaður, *verandi* tænari? legg ei í tað: men um tú kanst verða gjørdur fríur, brúka *tað* heldur.

22 Tí at hann, sum er kallaður í Harranum, *verandi* tænari, er frímaður Harrans: líkaleiðis eisini hann, sum er kallaður, *verandi* fríur, er tænari Christs.

23 Tit eru keyptir við einum virði; verið ikki tit tænarar manna.

24 Brøður, lat hvønn mann, hvarí hann er kallaður, harí verða *verandi* hjá Guði.

25 Nú, viðvíkjandi jomfrúgvum havi eg einkið boð av Harranum: tó gevi eg mína døming sum ēin, ið hevur lutast miskunn av Harranum at vera trúfastur.

26 Eg haldi tí, at hetta er gott, núverandi neyðar vegna, *eg sigi,* at *tað er* gott hjá einum manni so at vera.

27 Ert tú bundin at ektakonu? søk ikki at verða loystur. Ert tú loystur frá ektakonu? søk ikki ektakonu.

28 Men og um tú gifti *teg,* tú hevurt ikki syndað; og um ein jomfrúgv gifti *seg,* hon hevur ikki syndað. Hóast hetta, slík skulu hava trongslu í kjøtinum: men eg spari tykkum.

29 Men hetta sigi eg, brøður, tíðin *er* stutt: tað stendur eftir, at bæði teir sum hava ektakonur, veri sum um teir ongar høvdu;

30 Og teir sum gráta, sum um teir grótu ikki; og teir sum fegnast, sum um teir fegnaðust ikki; og teir sum keypa, sum um teir áttu ikki;

31 Og teir sum brúka henda heim, sum ikki misbrúkandi *hann:* tí at sniðið á hesum heimi gongur undir.

32 Men eg vildi havt tykkum uttan stúranarfullsemi. Hann, sum er ógiftur, hevur umsorgan fyri tingunum sum tilhoyra Harranum, hvussu hann kann toknast Harranum:

33 Men hann, sum er giftur, hevur umsorgan fyri tingunum sum eru av heiminum, hvussu hann kann toknast konu *síni*.
34 Tað er munur *eisini* ímillum eina ektakonu og eina jomfrúgv. Hin ógifta kvinnan hevur umsorgan fyri tingum Harrans, at hon má vera heilag bæði í likami og í anda: men hon, sum er gift, hevur umsorgan fyri tingum heimsins, hvussu hon má toknast ektamanni *sínum*.
35 Og hetta tali eg fyri tykkara egna gagn; ikki at eg kann kasta eina snerru uppá tykkum, men fyri tað sum er sámiligt, og at tit mega ganga Harranum til handar uttan hugspjaðing.
36 Men um nakar maður haldi, at hann háttar sær ósámiliga móti síni jomfrúgv, um hon fari framvið blóma aldurs *síns*, og so mái tarvast, lat hann gera hvat hann vilji, hann syndar ikki: lat tey giftast.
37 Hóast hetta hann, sum stendur støðufastur í hjarta sínum, havandi onga neyðsyn, men hevur mátt yvir egna vilja sínum, og hevur so avrátt í sínum hjarta, at hann vil halda síni jomfrúgv, ger væl.
38 So at hann, sum gevur *hana* í giftu, ger væl; men hann, sum gevur *hana* ikki í giftu, ger betur.
39 Ektakonan er bundin við lógini, so leingi sum ektamaður hennara livir; men um ektamaður hennara veri *seg* deyður, er hon við frælsi at verða gift við hvørjum hon vilji; einans í Harranum.
40 Men hon er glaðari, um hon soleiðis verði *verandi*, eftir míni døming: og eg haldi eisini, at eg havi Anda Guðs.

KAPITUL 8

NÚ, hvat varðar lutir, ofraðar skurðgudum, vit vita at vit allir hava kunnleika. Kunnleiki blæsur upp, men vælvild byggir upp.
2 Og um nakar maður haldi, at hann kennir nakað ting, hann kennir einkið enn, *so* sum hann átti at kent.
3 Men um nakar maður elski Guð, hin sami er kendur av honum.
4 Hvat viðvíkur, tessvegna, etingini av hasum tingunum, sum eru ofraði at skurðgudum í slátrofran, vit vita, at ein skurðgudur *er* einkið í heiminum, og at *tað er* eingin annar Guð, uttan ēin.
5 Tí tó at tað veri *seg*, sum verða kallaðir gudar, hvørt í himni ella á jørð, (eins og tað veri *seg* gudar mangir, og harrar mangir,)
6 Men fyri okkum *er tað bert* ēin Guð, Faðirin, frá hvørjum *eru* øll ting, og vit í honum; og ēin Harri Jesus Christus, av hvørjum *eru* øll ting, og vit av honum.
7 Hvussu enn er, *tað er* ikki í hvørjum manni tann kunnleikin: tí at summir, við medviti um skurðgudin, at hesum tíma eta *tað* sum eitt ting, ofrað einum skurðgudi; og samvitska teirra, verandi veik, verður dálkað.
8 Men matur viðmælir okkum ikki mót*vegis* Guði: tí at hvørki um vit eta, eru vit tað betri; eiheldur um vit eta ikki, eru vit tað verri.
9 Men verið varnir, at ikki við nøkrum háttarlagi hetta tykkara frælsi gerist ein snávingarsteinur hjá teimum sum eru veikir.
10 Tí um nakar maður síggi teg, sum hevurt kunnleika, sita til matar í templi skurðgudsins, skal ikki samvitska hansara, sum er veikur, verða gjørd djørv at eta hasi tingini sum eru ofraði til skurðguda;
11 Og ígjøgnum tín kunnleika skal hin veiki bróðirin glatast, fyri hvønn Christus doyði?
12 Men tá ið tit soleiðis synda ímóti brøðrunum, og sára teirra veiku samvitsku, synda tit ímóti Christi.
13 Hvørsvegna, um matur fái bróður mín at fáa meinboga, vil

eg einkið kjøt eta, meðan veroldin stendur, at ikki eg fái bróðir mín at fáa meinboga.

KAPITUL 9

ERI eg ikki ein ápostul? eri eg ikki fríur? havi eg ikki sæð Jesus Christ váran Harra? eru tit ikki verk mítt í Harranum?

2 Um eg veri *meg* ikki øðrum ein ápostul, tó ivaleyst eri eg fyri tykkum: tí at innsiglið uppá mítt ápostladømi eru tit í Harranum.

3 Mítt aftursvar til teirra, sum rannsaka meg, er hetta,

4 Hava vit ikki mátt til at eta og at drekka?

5 Hava vit ikki mátt til at leiða íkring eina systur, eina ektakonu, líka so væl sum aðrir ápostlar, og *sum* brøður Harrans, og Cē´-phăs?

6 Ella eg einans og Barnabas, hava ikki vit mátt til at lata vera *við* at arbeiða?

7 Hvør fer eina krígsferð nakrantíð á sínum egnu kostnaðum? hvør plantar ein víngarð, og etur ikki av ávøksti hansara? ella hvør gevur einum fylgi, og etur ikki av mjólkini av fylginum?

8 Sigi eg hesar lutir eins og maður? ella sigur ikki lógin tað sama eisini?

9 Tí at skrivað stendur í Móselógini, Tú skalt ikki múlabinda munnin á oksanum, sum treskir út kornið. Hevur Guð umsorgan fyri oksum?

10 Ella sigur hann *tað* samanumtikið fyri okkara sakir? Fyri okkara sakir, óivað, er *hetta* skrivað: at hann, sum pløgir, skuldi pløga í vón; og at hann sum treskir í vón skuldi vera luthavari í síni vón.

11 Um vit havi sáað tykkum andlig ting, *er tað* eitt mikið ting, um vit skulu heysta tykkara tímiligu ting?

12 Um aðrir veri luthavarar í *hesum* mátti yvir tykkum, *eru* ikki vit heldur? Hóast hetta, vit hava ikki brúkt henda mátt; men tola øll ting, at ikki vit skuldu hindrað gleðiboðskapi Christs.

13 Vita tit ikki, at teir, sum tæna kring heilag ting, liva *av tingunum* av templinum? og teir, sum varta um altarið, eru luthavarar við altarinum?

14 Enntá soleiðis hevur Harrin avrátt, at teir, sum prædika gleðiboðskapin, skuldu liva av gleðiboðskapinum.

15 Men eg havi eingi av hesum tingunum brúkt: eiheldur havi eg skrivað hesi tingini, at tað skuldi verða soleiðis gjørt mær: tí at *tað var* betri fyri meg at doyð, enn at nakar maður skuldi gjørt mína rósan til einkiðs.

16 Tí at hóast eg prædiki gleðiboðskapin, havi eg einkið at rósa *mær* av: tí at neyðsyn er løgd uppá meg; ja, vei er at mær, um eg prædiki ikki gleðiboðskapin!

17 Tí at um eg geri hetta tingið viljugliga, havi eg eitt endurgjald: men um ímóti mínum vilja, *so* er eitt trúar-húshald *gleðiboðskaparins* mær litið til.

18 Hvat er tá mítt endurgjald? *Sanniliga,* at tá ið eg prædiki gleðiboðskapin, kann eg fremja gleðiboðskap Christs uttan kostnað, at eg misbrúki ikki mín mátt í gleðiboðskapinum.

19 Tí at hóast eg veri *meg* fríur frá øllum *monnum,* tó havi eg gjørt meg sjálvan *til* tænara yvirfyri øllum, at eg mátti vinna tess fleiri.

20 Og Jødunum gjørdist eg sum Jødi, at eg mátti vinna Jødarnar; fyri teimum, sum eru undir lógini, sum undir lógini, at eg mátti vinna teir sum eru undir lógini;

21 Fyri teimum, sum eru uttan lóg, sum uttan lóg, (verandi ikki uttan lóg fyri Guði, men undir lógini fyri Christi,) at eg mátti vinna teir sum eru uttan lóg.

22 Fyri teimum veiku gjørdist eg eins og veikur, at eg mátti

vinna hinar veiku: eg eri gjørdur øll ting fyri øllum *monnum,* at eg mátti við øllum brøgdum frelsa summar.

23 Og hetta geri eg fyri gleðiboðskaparins skuld, at eg mátti verða luthavari í honum við *tykkum*.

24 Vita tit ikki, at teir, sum renna í kapprenning, renna allir, men ein fær virðisløthings? Soleiðis rennið, at tit mega lutast.

25 Og hvør *ein* maður, sum kempar fyri meistaraskapinum, er fráhaldandi í øllum tingum. Nú, teir *gera tað fyri* at lutast eina forgongiliga krúnu; men vit eina óforgongiliga.

26 Eg tí soleiðis renni, ikki sum óvissuliga; soleiðis berjist eg, ikki sum ein sum slær *í tóma* luft:

27 Men eg haldi undir mítt likam, og føri *tað* inn í undirgivni: at ikki við nøkrum brøgdum, tá ið eg havi prædikað fyri øðrum, eg sjálvur skuldi verðið ein burturvísingur.

KAPITUL 10

HARAFTURAT, brøður, eg vildi ikki, at tit skuldu verið óvitandi, hvussu ið allir okkara fedrar vóru undir skýgginum, og allir fóru ígjøgnum sjógvin;

2 Og vórðu allir doyptir at Mósesi í skýgginum og í sjónum;

3 Og ótu allir hin sama andliga mat;

4 Og drukku allir hin sama andliga drykk: tí at teir drukku av tí andliga Kletti sum fylgdi teimum: og tann Kletturin var Christus.

5 Men við mangar av teimum var Guð ikki væl nøgdur: tí at teir vórðu veltir um koll í oyðuni.

6 Nú, hesi ting vórðu okkara fyridømir, til tess endamáls, *at* vit skuldu ikki girnast eftir illum tingum, eins og teir eisini girnaðust.

7 Eiheldur veri tit avgudadýrkarar, eins og *vóru* summir av teimum; sum skrivað stendur, Fólkið settist niður at eta og drekka, og reistist upp at spæla.

8 Eiheldur latum okkum fremja siðloysi, eins og summir av teimum framdu, og fullu í einum degi trý og tjúgu túsund.

9 Eiheldur latum okkum freista Christ, eins og summir av teimum eisini freistaðu, og vórðu oyddir av høggormum.

10 Eiheldur knarri tit, eins og summir av teimum eisini knarraðu, og vórðu oyddir av oyðaranum.

11 Nú, øll hesi tingini hendu teimum til fyridømir: og tey eru skrivaði fyri okkara formaning, uppá hvørjar endar veraldarinnar eru komnir.

12 Hvørsvegna lat hann, sum heldur hann stendur, geva gætur, at ikki hann falli.

13 Tað hevur eingin freisting tikið tykkum uttan slík, sum er vanlig hjá manni: men Guð *er* trúfastur, sum ikki vil loyva tykkum at verða freistaðar uppum tað, tit eru mentir; men vil, við freistingini, eisini gera ein veg at komast undan, at tit mega vera mentir at bera *tað*.

14 Hvørsvegna, mínir kærliga elskaðu, flýggið frá skurðgudadýrkan.

15 Eg tali sum til vísar menn; dømið tit hvat eg sigi.

16 Signingarbikarið, sum vit vælsigna, er tað ikki samfund blóðs Christs? Breyðið, sum vit bróta, er tað ikki samfund likams Christs?

17 Tí at vit, *verandi* mangir, eru eitt breyð, *og* eitt likam: tí at vit eru allir luttakarar í tí eina breyðinum.

18 Skoðið Ísrael eftir kjøtinum: eru ikki teir, sum eta av sláturofrunum, luttakarar í altarinum?

19 Hvat sigi eg tá? at skurðgudurin er nakað, ella tað, sum er ofrað í sláturofri til skurðguda, er nakað?

20 Men *eg sigi,* at tingini, sum Heidningarnir sláturofra, slátur-

ofra teir til djevla, og ikki til Guðs: og eg vildi ikki, at tit skuldu havt samfelag við djevlar.

21 Tit kunnu ikki drekka bikar Harrans, og bikar djevla: tit kunnu ikki vera luttakarar í borði Harrans, og í borði djevla.

22 Eggja vit Harran til ástbrelnis? eru vit sterkari enn hann?

23 Øll ting eru lóglig hjá mær, men øll eru ikki gagnlig: øll ting eru lóglig hjá mær, men øll ting byggja ikki upp.

24 Eingin maður søki sítt egna, men hvør maður ein annans *uppríking*.

25 Hvatsumhelst *ið* verður selt hjá slaktaranum, *tað* etið, spyrjandi ongan spurning fyri samvitskunnar skuld:

26 Tí at jørðin *er* Harrans, og fylling hennara.

27 Um nakar av teimum, sum trúgva ikki, bjóði tykkum *til veitslu,* og tit havi hug at fara; hvatsumhelst *ið* verður sett frammanfyri tykkum, etið, spyrjandi ongan spurning fyri samvitskunnar skuld.

28 Men um nakar maður sigi við tykkum, Hetta er ofrað skurðgudum í sláturofri, etið ikki hansara vegna sum sýndi tað, og fyri samvitskunnar skuld: tí at jørðin *er* Harrans, og fylling hennara:

29 Samvitskunnar, sigi eg, ikki tínar egnu, men hjá hīnum: tí at hví verður mítt frælsi dømt av samvitsku annars *mans?*

30 Tí at um eg av náði veri *meg* ein luthavari, hví verði eg ilt talaður um fyri tað, fyri hvørt eg veiti tøkkir?

31 Hvørt, tessvegna, tit eti ella drekki, ella hvatsumhelst tit geri, gerið alt til dýrdar Guðs.

32 Voldið ongum meinboga, hvørki Jødunum, ella Heidningunum, ella kirkju Guðs:

33 Enntá sum eg toknist øllum *monnum* í øllum *tingum,* ei søkjandi mítt egna gagn, men *gagnið* hjá mongum, at teir mega verða frelstir.

KAPITUL 11

VERIÐ tit eftirfylgjarar av mær, enntá eins og eg eisini *eri* av Christi.

2 Nú, eg prísi tykkum, brøður, at tit minnast til mín í øllum tingum, og halda fyriskipanirnar, sum eg avhandaði tykkum *tær.*

3 Men eg vildi havt tykkum *at* vita, at høvur hvørs mans er Christus; og høvur kvinnunnar *er* maðurin; og høvur Christs *er* Guð.

4 Hvør maður, biðjandi ella propheterandi, havandi høvur *sítt* dekkað, vanærir høvur sítt.

5 Men hvør kvinna, sum biður ella propheterar við høvdi *sínum* ódekkaðum, vanærir høvur sítt: tí at tað er enntá alt ēitt sum um hon var *hár*skorin.

6 Tí um kvinnan veri ikki dekkað, lat hana eisini verða *hár*skorin: men um tað veri *seg* skomm hjá eini kvinnu at vera *hár*skorin ella rakað, lat hana vera dekkað.

7 Tí ein maður víst átti ikki at dekkað *sítt* høvur, við tað at hann er mynd og dýrd Guðs: men kvinnan er dýrd mansins.

8 Tí at maðurin er ikki av kvinnuni; men kvinnan av manninum.

9 Eiheldur varð maðurin skapaður fyri kvinnuna; men kvinnan fyri mannin.

10 Fyri hesa grund átti kvinnan at hava mátt á høvdi *sínum,* uppá grund av einglunum.

11 Hóast hetta, hvørki er maðurin uttan kvinnuna, eiheldur kvinnan uttan mannin, í Harranum.

12 Tí at eins og kvinnan *er* av manninum, enntá soleiðis *er* maðurin eisini við kvinnuni; men allir lutir av Guði.

13 Dømið í tykkum sjálvum: er tað sámiligt, at ein kvinna biðji til Guðs ódekkað?

14 Lærir ikki sjálvt náttúran sjálv tykkum, at um maður havi langt hár, tað er honum skomm?
15 Men um ein kvinna havi langt hár, *tá* er tað ein dýrd hjá henni: tí at *hennara* hár er givið henni til eina dekking.
16 Men um nakar maður tykist vera klandursamur, vit hava onga slíka venju, eiheldur kirkjur Guðs.
17 Nú, í hesum, sum eg kunngeri *tykkum,* prísi eg *tykkum* ikki, at tit koma saman, ikki til tað betra, men til tað verra.
18 Tí at fyrst av øllum, tá ið tit koma saman í kirkjuni, hoyri eg, at tað veri sundurdeilingar tykkara millum; og eg lutvís trúgvi tí.
19 Tí at tað mega vera eisini ranglærur tykkara millum, at teir, sum eru viðurkendir, mega verða gjørdir eyðsýndir tykkara millum.
20 Tá ið tit koma saman tessvegna inn í ēitt stað, er *hetta* ikki til at eta kvøldmáltíð Harrans.
21 Tí at í eting fær sær hvør *og* ēin frammanundan *hīnum* sín egna náttverða: og ēin er svangur, og ein annar er drukkin.
22 Hvat? hava tit ikki hús˘ at eta og at drekka í? ella vanvirða tit kirkju Guðs, og gera tey fyri skommum, sum hava ikki? Hvat eigi eg at siga til tykkara? skal eg prísa tykkum í hesum? eg prísi *tykkum* ikki.
23 Tí at eg havi fingið frá Harranum tað, sum eisini eg handaði tykkum, At Harrin Jesus ta *somu* nátt, í hvørji hann varð svikin, tók breyð:
24 Og tá ið hann hevði veitt tøkkir, breyt hann *tað,* og segði, Takið, etið: hetta er likam mítt, sum verður brotið fyri tykkum: hetta gerið í endurminning um meg.
25 Eftir hinum sama háttarlagi eisini *tók hann* bikarið, tá ið hann hevði etið náttverðan, sigandi, Hetta bikar er hitt nýggja testamenti í blóði mínum: hetta gerið tit, so ofta sum tit *tað* drekka, í endurminning um meg.
26 Tí at so ofta sum tit eta hetta breyð, og drekka hetta bikar, sýna tit deyða Harrans, til hann komi.
27 Hvørsvegna, hvørsumhelst *ið* skal eta hetta breyð, og drekka *hetta* bikar Harrans óverdugliga, skal vera sekur í likami og blóði Harrans.
28 Men lat ein mann rannsaka seg sjálvan, og síðan lat hann eta av *tí* breyðinum, og drekka av *tí* bikarinum.
29 Tí at hann, sum etur og drekkur óverdigani, etur og drekkur heldøming til sín sjálvs, ei gerandi mun á likami Harrans.
30 Fyri hesa grund *eru* mangir veikir og sjúkligir tykkara millum, og mangir sova.
31 Tí at um vit vildu dømt okkum sjálvar, skuldu vit ikki verðið dømdir.
32 Men tá ið vit verða dømdir, verða vit tyktaðir av Harranum, at vit skuldu ei verðið fordømdir við heiminum.
33 Hvørsvegna, brøður mínir, tá ið tit koma saman at eta, bíðið hvør eftir øðrum.
34 Og um nakar maður hungri, lat hann eta heima; at tit komi ikki saman til fordømingar. Og restina vil eg seta í rættlag, tá ið eg komi.

KAPITUL 12

NÚ, viðvíkjandi andligum *gávum,* brøður, vildi eg ikki havt tykkum óvitandi.
2 Tit vita, at tit vóru Heidningar, bornir burtur at hesum málleysu skurðgudunum, enntá sum tit vórðu leiddir.
3 Hvørsvegna eg gevi tykkum at skilja, at eingin maður, talandi við˘ Anda Guðs, kallar Jesus bannaðan: og *at* eingin maður kann siga, at Jesus er Harrin, uttan við˘ Halga Andanum.

4 Nú, tað eru ymisleikar av gávum, men hin sami Andin.
5 Og tað eru munir á fyrisitingum, men hin sami Harrin.
6 Og tað eru ymisleikar av virknaðum, men tað er hin sami Guð, sum virkar alt í øllum.
7 Men tilkennargeving Andans verður givin til hvønn mann at gagna við øllum.
8 Tí at til ēin verður givið av Andanum vísdómsorðið; til ein annan kunnskaparorðið av hinum sama Andanum;
9 Til ein annan trúgv av sama Andanum; til ein annan gávurnar av grøðing av sama Andanum;
10 Til ein annan virkingin av kraftarverkum; til ein annan prophetī; til ein annan greining av andum; til ein annan *ymis* sløg av tungum; til ein annan týðingin av tungum:
11 Men øll hesi virkar hin ēini og sami sjálvi Andin, deilandi út til hvønn mann fyri seg, eins og hann vilji.
12 Tí at eins og likamið er ēitt, og hevur mangar limir, og allir limirnir hjá tí ēina likaminum, verandi mangir, eru ēitt likam: soleiðis eisini *er* Christus.
13 Tí við^ ēinum Anda eru vit allir doyptir inn í ēitt likam, hvørt *vit veri* Jødar ella Heidningar, hvørt *vit veri* trælir ella frælsir; og hava allir verðið fingnir at drekka inn í ēin Anda.
14 Tí at likamið er ikki ēin limur, men mangir.
15 Um fóturin skal siga, Av tí at eg eri ikki hondin, hoyri eg ikki til likamið; hoyrir hann tí ikki til likamið?
16 Og um oyrað skal siga, Av tí at eg eri ikki eygað, hoyri eg ikki til likamið; hoyrir tað tí ikki til likamið?
17 Um alt likamið *var* eitt eyga, hvar *var* hoyrnin? Um tað heila *var* hoyrn, hvar *var* luktingin?
18 Men nú hevur Guð sett limirnar hvønn *og* ēin av teimum í likamið, sum tað hevur hóvað honum.
19 Og um teir allir vóru ēin limur, hvar *var* likamið?
20 Men nú *eru teir* mangir limir, tó bert ēitt likam.
21 Og eygað kann ikki siga við hondina, Eg havi ongan tørv á tær: ella aftur høvdið til føturnar, Eg havi ongan tørv á tykkum.
22 Nei, mikið meira teir limirnir á likaminum, sum tykjast at vera meiri neyðarsligir, eru neyðugir:
23 Og teir *limirnir* á likaminum, sum vit halda at vera minni ærumiklar, uppá hesar leggja vit meiri ríkiliga æru; og okkara ósømiligu *partar* hava meiri ríkiligan sømiligleika.
24 Tí at okkara sømiligu *partar* hava ongan tørv: men Guð hevur snikkað likamið saman, havandi givið meiri ríkiliga æru til tann *partin* sum treyt:
25 *Fyri* at tað einkið split skuldi vera í likaminum; men *at* limirnir skuldu hava hina somu umsorgan hvør fyri øðrum.
26 Og hvørt ēin limur líði, líða allir limirnir við honum; ella ēin limur verði heiðraður, fegnast allir limirnir við honum.
27 Nú, tit eru likam Christs, og limir hvør ísær.
28 Og Guð hevur sett summar í kirkjuni, fyrst ápostlar, í øðrum lagi prophetar, í triðja lagi frálærarar, tínæst kraftarverk^, síðan gávur av grøðingum, hjálpir, stjórnanir, ymisleikar av tungum.
29 *Eru* allir ápostlar? *eru* allir prophetar? *eru* allir frálærarar? *eru* allir virkarar av kraftarverkum?
30 Hava allir gávurnar av grøðing? tala allir við tungum? týða allir?
31 Men girnist inniligani hinar bestu gávurnar: og enn sýni eg tykkum ein meiri avbæran veg.

KAPITUL 13

TÓ eg tali við tungum manna og eingla, og havi ikki vælvild, eri eg vorðin *sum* ljómandi messing, ella klingandi glymskál.

2 Og tó eg havi *gávuna av* prophetīi, og skilji allar loyndardómar, og allan kunnleika; og tó eg havi alla trúgv, so at eg kundi burtflutt fjøll, og havi ikki vælvild, eg eri einkið.

3 Og tó eg lati út alt mítt góðs at føða *tey fátøku,* og tó eg gevi mítt likam til at verða brent, og havi ikki vælvild, tað gagnar mær einkið.

4 Vælvild ber leingi yvir, *og* er blíð; vælvild øvundar ikki; vælvild breggjar ikki sær sjálvari, er ikki uppblásin,

5 Ber seg ikki ósømiligani at, søkir ikki sítt egna, verður ikki lættligani ilskað, hugsar einkið ilt;

6 Fegnast ikki í misgerð, men fegnast í sannleikanum;

7 Ber øll ting, trýr øllum tingum, vónar øll ting, heldur út øll ting.

8 Vælvild svíkur aldri: men hvørt *tað veri seg* prophetīir, tey skulu svíkja; hvørt *tað veri* tungur, tær skulu halda uppat; hvørt *tað veri seg* kunnleiki, hann skal hvørva burt.

9 Tí at vit skyna í pørtum, og vit prophetera í pørtum.

10 Men tá ið tað, sum er fullkomið, er komið, tá skal tað, sum er í pørtum, verða tikið av.

11 Tá ið eg var barn, talaði eg sum barn, skilti eg sum barn, hugsaði eg sum barn: men tá ið eg gjørdist maður, legði eg av barnsligar lutir.

12 Tí at nú síggja vit ígjøgnum eitt glar, skýmligani; men tá andlit til andlits: nú kenni eg partvís; men tá skal eg kenna enntá sum eisini eg eri kendur.

13 Og nú verður *verandi* trúgv, vón, vælvild, hesi trý; men hin størsta av hesum *er* vælvild.

KAPITUL 14

STUNDIÐ á vælvild, og tráið andligar *gávur,* men helst at tit mega prophetera.

2 Tí at hann, sum talar í eini *ókendari* tungu, talar ikki fyri monnum, men fyri Guði: tí at eingin maður skilur *hann;* hvussu enn er, í andanum talar hann loyndarmál.

3 Men hann, sum propheterar, talar fyri monnum *til* uppbyggingar, og formaningar, og ugganar.

4 Hann, sum talar í eini *ókendari* tungu, uppbyggir seg sjálvan; men hann, sum propheterar, uppbyggir kirkjuna.

5 Eg vildi, at tit allir talaðu við tungum, men heldur, at tit propheteraðu: tí at størri *er* hann, sum propheterar, enn hann, sum talar við tungum, uttan hann týði, at kirkjan má fáa uppbygging.

6 Nú, brøður, um eg komi til tykkara, talandi við tungum, hvat skal eg gagna tykkum, uttan eg skal tala til tykkum antin við opinbering, ella við kunnleika, ella við prophetering, ella við Guðslæru?

7 Og sjálvt lutir uttan lív, gevandi ljóð, hvørt pípa ella harpa, uttan teir gevi greinarmun á ljóðunum, hvussu skal tað verða skynað hvat verður pípað ella harpað?

8 Tí at um lúðurin gevi eitt óvist ljóð, hvør skal fyribúgva seg til bardagan?

9 So líkaleiðis tit, uttan tit mæli við tunguni orð, nemm at verða skild, hvussu skal tað verða skynað hvat verður talað? tí at tit skulu tala inn í *tóma* luft.

10 Tað eru, vera má, so *og so* mong sløg av røddum í veröldini, og eingin av teimum *er* uttan merking.

11 Tessvegna, um eg kenni ikki týdningin á røddini, skal eg vera honum, sum talar, ein barbári, og hann, sum talar, *skal vera* mær ein barbári.

12 Enntá soleiðis tit, eftir sum at tit eru vandlátir um andligar *gávur,* søkið *eftir,* at tit mega fara longur fram til uppbyggingina av kirkjuni.

13 Hvørsvegna lat hann, sum talar í eini *ókendari* tungu, biðja, at hann má týða.

14 Tí at um eg biði í eini *ókendari* tungu, biður andi mín, men skil mítt er uttan ávøkst.

15 Hvat er tað tá? eg vil biðja við andanum, og eg vil biðja við skilinum eisini: eg vil syngja við andanum, og eg vil syngja við skilinum eisini.

16 Annars tá ið tú skalt vælsigna við andanum, hvussu skal hann, sum upptekur plássið hjá tí ólærda, siga Á-mën við takkarveitan tína, við tað *at* hann skilur ikki hvat tú sigurt?

17 Tí at tú víst veitirt tøkkir væl, men hin verður ikki uppbygdur.

18 Eg takki Guði mínum, *at* eg tali við tungum meir enn tit allir:

19 Tó í kirkjuni hevði eg heldur talað fimm orð við skili mínum, at *við míni rødd* eg mátti læra aðrar eisini, enn tíggju túsund orð í eini *ókendari* tungu.

20 Brøður, verið ikki børn í skili: hvussu enn er, í illvilja verið børn, men í skili verið menn.

21 Í lógini stendur skrivað, Við *monnum av* øðrum tungum og øðrum vørrum vil eg tala við hetta fólk; og tó fyri alt tað vilja teir ikki hoyra meg, sigur Harrin.

22 Av hvørji grund tungur eru til eitt tekin, ikki fyri teimum sum trúgva, men fyri teimum sum ikki trúgva: men prophetering *tænir* ikki fyri teimum sum ikki trúgva, men fyri teimum sum trúgva.

23 Um tí øll kirkjan veri komin saman inn í ēitt plass, og allir tali við tungum, og tað komi inn *teir sum eru* ólærdir, ella vantrúgvandi, vilja teir ikki siga, at tit eru óðir?

24 Men um allir prophēteri, og tað komi inn ēin sum trýr ikki, ella *ēin* ólærdur, hann verður sannførdur av øllum, hann verður dømdur av øllum:

25 Og svá verða loyndarmál hjarta hansara gjørd eyðsýnd; og so, fallandi niður á andlit *sítt,* vil hann tilbiðja Guð, og boða frá, at Guð er í tykkum av sonnum.

26 Hvussu er tað tá, brøður? tá ið tit koma saman, hvør *og* ēin av tykkum hevur ein psálm, hevur eina Guðslæru, hevur eina tungu, hevur eina opinbering, hevur eina týðing. Latið allar lutir verða gjørdar til uppbyggingar.

27 Um nakar maður tali í eini *ókendari* tungu, *latið tað vera* sum tveir, ella í mesta lagi *sum* tríggjar, og *tað* eftir raðfylgju; og latið ēin týða.

28 Men um tað veri eingin týðari, lat hann binda frið í kirkjuni; og lat hann tala fyri sær sjálvum, og fyri Guði.

29 Latið prophetarnar tala tveir ella tríggjar, og latið hīnar døma.

30 Um *nakað ting* verði opinberað fyri einum øðrum sum situr hjá, lat hin fyrsta binda frið.

31 Tí at tit mega allir prophetera ēin eftir ēinum, at allir mega læra, og allir mega verða uggaðir.

32 Og andarnir hjá prophetunum eru undirgivnir fyri prophetunum.

33 Tí at Guð er ikki *høvundur* ørkymlanar, men friðar, sum í øllum kirkjum hjá teimum heilagu.

34 Latið kvinnur tykkara halda tøgn í kirkjunum: tí at tað er ikki loyvt teimum at tala; men *teimum er boðið* at vera undir lýdni, sum eisini lógin sigur.

35 Og um tær vilji læra nakran lut, lat tær spyrja sínar ektamenn heima: tí at tað er ein skomm hjá kvinnum at tala í kirkjuni.

36 Hvat? kom orð Guðs út frá tykkum? ella kom tað til tykkara einans?

37 Um nakar maður haldi seg sjálvan at vera ein prophet, ella andligan, lat hann viðurkenna, at tingini, sum eg skrivi til tykkara, eru boðini hjá Harranum.
38 Men um nakar maður veri óvitandi, lat hann vera óvitandi.
39 Hvørsvegna, brøður, girnist *eftir* at prophetera, og forbjóðið ikki at tala við tungum.
40 Latið øll ting verða gjørd sømiligani og í reglu.

KAPITUL 15

HARUMFRAMT, brøður, eg kunngeri tykkum gleðiboðskapin, hvønn eg prædikaði tykkum, hvørjum tit eisini hava tikið við, og í hvørjum tit standa;
2 Viðˆ hvørjum eisini tit verða frelstir, um tit haldi í minni hvat eg prædikaði tykkum, uttan *so* tit havi trúð til einkiðs.
3 Tí at eg avhendi tykkum fyrst av øllum tað, sum eg eisini tók ímóti, hvussu ið Christus doyði fyri okkara syndir samsvarandi við skriftirnar;
4 Og at hann varð grivin, og at hann reis *upp* aftur triðja dagin samsvarandi við skriftirnar:
5 Og at hann varð sæddur av Cê´-phās-i, síðan av teimum tólv:
6 Eftir tað varð hann sæddur av omanfyri fimm hundrað brøðrum í senn; av hvørjum meginparturin er eftir *fram*at hesi núverandi *tíð*, men summir eru sovnaðir.
7 Eftir tað varð hann sæddur av Jákobi; síðan av øllum ápostlunum.
8 Og síðst av øllum varð hann sæddur av mær eisini, sum av ēinum, føddum uttanfyri ásetta tíð.
9 Tí at eg eri hin minsti av ápostlunum, sum eri ikki hóskiligur at verða kallaður ein ápostul, av tí at eg søkti at kirkju Guðs.
10 Men viðˆ Guðs náði eri eg tað *sum* eg eri: og hansara náði, sum *varð latin út* uppá meg, varð ikki til einkiðs; men eg strevaðist meiri ríkiligani enn teir allir: tó ikki eg, men Guðs náði, sum við mær var.
11 Tessvegna, hvørt *tað var* eg ella teir, soleiðis prædika vit, og soleiðis trúðu tit.
12 Nú, um Christus verði prædikaður, at hann reis frá teimum deyðu, hvussu siga summir tykkara millum, at tað er eingin uppreisn av teimum deyðu?
13 Men um tað veri eingin uppreisn av teimum deyðu, tá er Christus ikki risin:
14 Og um Christus veri ikki risin, tá *er* okkara prædikan fáfongd, og tykkara trúgv *er* eisini fáfongd.
15 Ja, og vit eru funnir følsk vitnir um Guð; av tí at vit hava vitnað um Guð, at hann reisti upp Christ: hvønn hann reisti ikki upp, um so veri, at hinir deyðu rísi ei.
16 Tí at um hinir deyðu rísi ei, tá er ikki Christus reistur:
17 Og um Christus veri ikki reistur, *tá er* trúgv tykkara fáfongd; tit eru enn í syndum tykkara.
18 Tá eru teir eisini, sum eru sovnaðir í Christi, glataðir.
19 Um í hesum lívi einans vit hava vón á Christ, eru vit av øllum monnum mest vesæligir.
20 Men nú er Christus risin frá teimum deyðu, *og* vorðin frumávøksturin av teimum ið svóvu.
21 Tí at eftir sum viðˆ manni *kom* deyði, viðˆ manni *kom* eisini uppreisnin av teimum deyðu.
22 Tí at eins og í Adami allir doyggja, enntá soleiðis í Christi skulu allir verða gjørdir livandi.
23 Men hvør maður í sínum egna skifti: Christus frumávøksturin; síðan teir sum eru Christs við hansara komu.
24 So *kemur* endin, tá ið hann skal hava givið upp kongadømið til Guðs, enntá Faðirsins; tá ið hann skal hava lagt niður alla stjórn og alt harradømi og mátt.

25 Tí at hann má ráða, til hann hevur lagt allar fíggindar undir føtur hansara.
26 Hin síðsti fíggindi, *sum* skal verða oyddur, *er* deyði.
27 Tí at hann hevur lagt allar lutir undir føtur hansara. Men tá ið hann sigur, allir lutir eru lagdir undir *hann, er tað* eyðsýnt, at hann er undantikin sum legði allar lutir undir hann.
28 Og tá ið allir lutir skulu verða undirlagdir hann, tá skal Sonurin eisini sjálvur verða undirgivin hann sum legði allar lutir undir hann, at Guð má vera alt í øllum.
29 Annars hvat skulu teir gera, sum eru doyptir fyri hinar deyðu, um hinir deyðu rísi ikki yvirhøvur? hví verða teir tá doyptir fyri hinar deyðu?
30 Og hví standa vit í vanda hvønn tíma?
31 Eg vitni viðˆ tykkara rósan, sum eg havi í Christi Jesusi Harra várum, Eg doyggi dagliga.
32 Um, eftir háttarlagi manna, eg havi barst við villdjór í Ē´-phĕsūs, hvat gagnar tað mær, um hinir deyðu rísi ei? latum oss eta og drekka; tí at í morgin doyggjum vær.
33 Verðið ikki villleiddir: illir felagskapir spilla góðar atferðir.
34 Vaknið til rættvísi, og syndið ikki; tí at summir hava ikki kunnleikan til Guðs: eg tali *hetta* tykkum til skammar.
35 Men onkur *maður* vil siga, Hvussu verða hinir deyðu reistir upp? og við hvørjum likami koma teir?
36 *Tin* dári, tað, sum tú sáart, verður ei gjørt livandi, uttan tað doyggi:
37 Og tað, sum tú sáart, tú sáart ikki likamið, sum verða skal, men ber frækorn, tað má tilvild av hveiti, ella av onkrum øðrum *frækorni:*
38 Men Guð gevur tí eitt likam, sum tað hevur hóvað honum, og til hvørt frækorn sítt egna likam.
39 Alt kjøt *er* ikki tað sama kjøtið: men *til er* ēitt *slag av* kjøti manna, eitt annað av kjøti djóra, eitt annað av fiska, *og* eitt annað av fugla.
40 *Til eru* eisini likam himinslig, og likam jarðislig: men dýrd teirra himinsligu *er* ēin, og *dýrd* teirra jarðisligu *er* ein onnur.
41 *Til er* ēin dýrd sólarinnar, og ein onnur dýrd mánans, og ein onnur dýrd stjarnanna: tí at *ēin* stjørna ber frá *eini aðrari* stjørnu í dýrd.
42 Soleiðis eisini *er* uppreisn teirra deyðu. Tað verður sáað í forgongiligleika; tað verður reist *upp* í óforgongiligleika:
43 Tað verður sáað í vanæru; tað verður reist í dýrd: tað verður sáað í veikleika; tað verður reist í kraft:
44 Tað verður sáað eitt náttúrligt likam; tað verður reist eitt andligt likam. Til er eitt náttúrligt likam, og til er eitt andligt likam.
45 Og soleiðis stendur skrivað, Hin fyrsti maður, Adam, varð gjørdur ein livandi sál; hin síðsti Adam *varð gjørdur* ein lívgandi andi.
46 Hvussu enn er, tað *varð* ikki fyrst sum er andligt, men tað sum er náttúrligt; og síðan tað sum er andligt.
47 Hin fyrsti maðurin *er* av jørðini, jarðiskur: hin annar maðurin *er* Harrin frá himni.
48 Eins og *er* hin jarðiski, slíkir *eru* teir eisini sum eru jarðiskir: og eins og *er* hin himinski, slíkir *eru* teir eisini sum eru himinskir.
49 Og eins og vit hava borið mynd hins jarðiska, skulu vit eisini bera mynd hins himinska.
50 Nú, hetta sigi eg, brøður, at kjøt og blóð kann ikki arva

kongadømi Guðs; eiheldur arvar forgongiligleiki óforgongiligleika.
51 Sí, eg kunngeri tykkum ein loyndardóm; Vit skulu ikki allir sova, men vit skulu allir verða umbroyttir,
52 Í einum viðbragdi, í einum eygnablunki, við hitt síðsta lúðursljóð: tí at lúðurin skal ljóða, og hinir deyðu skulu verða reistir óforgongiligir, og vit skulu verða umbroyttir.
53 Tí at hetta forgongiliga má latast í óforgongiligleika, og hetta deyðiliga *má* latast í ódeyðiligleika.
54 So tá ið hetta forgongiliga skal hava latist í óforgongiligleika, og hetta deyðiliga skal hava latist í ódeyðiligleika, tá skal vera fingin at henda framsøgnin, sum stendur skrivað, Deyði er uppslúkaður í sigur.
55 O deyði, hvar *er* broddur tín? O grøv, hvar *er* sigur tín?
56 Broddur deyðans *er* synd*in;* og styrki syndarinnar *er* lógin.
57 Men tøkk *veri* til Guðs, sum gevur okkum sigurin gjøgnum Harra okkara Jesus Christ.
58 Tessvegna, mínir háttelskaðu brøður, verið tit støðufastir, óvikiligir, altíð ríkiligir í Harrans verki, við tað at tit vita, at tykkara arbeiði er ikki til einkiðs í Harranum.

KAPITUL 16

NÚ, viðvíkjandi innsavningini til tey heilagu, eins og eg havi givið Galatiu-kirkjunum boð, enntá soleiðis gerið tit.
2 Uppá hin fyrsta *dagin* av vikuni lat hvønn *og* ēin av tykkum leggja niðurfyri hjá sær í goymslu, *so* sum *Guð* hevur blómað hann, at tað verði ongar innsavningar tá ið eg komi.
3 Og tá ið eg komi, hvørjarsumhelst *ið* tit skulu góðkenna við brøvum *tykkara,* teir vil eg senda at føra tykkara gávumildni til Jerusalem.
4 Og um tað veri hóskiligt at eg fari eisini, skulu teir fara við mær.
5 Nú, eg vil koma til tykkara, tá ið eg skal fara ígjøgnum Măc-ĕ-dŏ´-nĭ-ŭ: tí at eg fari ígjøgnum Măc-ĕ-dŏ´-nĭ-ŭ.
6 Og tað kann vera, at eg vil dvølja, ja, og vetra hjá tykkum, at tit mega føra meg á míni ferð hvagarsumhelst *ið* eg fari.
7 Tí at eg vil ikki síggja tykkum nú á veginum; men eg líti á at steðga eina stund hjá tykkum, um Harrin loyvi.
8 Men eg vil steðga í Ē´-phĕ-sŭs inntil Hvítusunnu.
9 Tí ein mikil hurð og ávirkanarmikil er upplatin mær, og *tað eru* mangir mótstandarar.
10 Nú, um Timotheus komi, síggið til, at hann kann vera hjá tykkum uttan ótta: tí at hann virkar verk Harrans, eins og eg eisini *geri.*
11 Latið ongan mann, tessvegna, vanvirða hann: men førið hann fram í friði, at hann má koma til mín: tí at eg vænti hann við brøðrunum.
12 Hvat *okkara* bróður Ă-pŏl´-lŏs nertir, eg stórliga tráaði hann at koma til tykkara við brøðrunum: men hansara vilji var als ikki at koma á hesi tíð; men hann vil koma, tá ið hann skal hava lagaliga tíð.
13 Vakið tit, standið fastir í trúnni, búgvið tykkum sum menn, verið sterkir.
14 Latið øll tykkara ting verða gjørd við vælvild.
15 Eg trábiði tykkum, brøður, (tit kenna hús Stēph´-ăn-ăs-ar, at tað er frumávøksturin av Â-chāĭ´-ŭ, og *at* tey hava bundið seg sjálv til tænastu teirra heilagu,)
16 At tit undirgevi tykkum sjálvar at slíkum, og fyri hvørjum tí sum hjálpir við *okkum,* og arbeiðir.
17 Eg eri glaður um komu Stēph´-

ăn-ăs-ar og Fŏr-tū-nā´-tūs-ar og Â-chā´-ī-cūs-ar: tí at tað, sum vantaði á í tykkara lut, hava teir veitt.
18 Tí at teir hava endurfrískað mín anda og tykkara: tessvegna viðurkennið tit teir sum slíkir eru.
19 Asiu-kirkjurnar lata heilsa tykkum. Ă-quĭ´-lăs og Prisçilla lata heilsa tykkum mikið í Harranum, við kirkjuni sum er í húsi teirra.
20 Allir brøðurnir lata heilsa tykkum. Heilsið tit hvør øðrum við einum heilagum kossi.
21 Heilsanin hjá *mær,* Paulusi, við míni egnu hond.
22 Um nakar maður elski ikki Harran Jesus Christ, hann veri Ă-nā´-thĕ-mă Mā-răn-ā´-thă.
23 Náði várs Harra Jesu Christs *veri* við tykkum.
24 Kærleiki mín *veri* við tykkum øllum í Christi Jesusi. Â´-mĕn.

¶ Hin fyrri *epistilin* til Corintharanna varð skrivaður frá Philippi av Stĕph´-ăn-ās-i, og Fŏr-tū-nā´-tūs-i, og Â-chā´-ī-cūs-i, og Timotheusi.

HIN SEINNI EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS TIL CORINTHARANNA.

KAPITUL 1

PAULUS, ein ápostul Jesu Christs við vilja Guðs, og Timotheus, bróðir *okkara,* til kirkju Guðs sum er í Corinth, við øllum teimum heilagu sum eru í allari Â-chaĭ´-ū:
2 Náði *veri* til tykkara og friður frá Guði Faðir várum, og *frá* Harranum Jesusi Christi.
3 Signaður *veri* Guð, enntá Faðir várs Harra Jesu Christs, Faðir miskunna, og Guð allrar ugganar;
4 Hvør oss uggar í allari trongslu vári, at vær megum vera førir fyri at ugga teir sum eru í onkrari trongd, við teirri uggan, við hvørji vær sjálvir verðum uggaðir av Guði.
5 Tí eins og Christi líðingar eru ríkiligar í okkum, soleiðis er okkara troyst eisini ríkilig við Christi.
6 Og hvørt vit verði plágaðir, *er tað* fyri tykkara troyst og frelsu, sum er virksamt í úthaldinum av hinum somu líðingunum sum vit eisini líða: ella hvørt vit verði uggaðir, *er tað* fyri tykkara troyst og frelsu.
7 Og okkara vón um tykkum *er* støðuføst, vitandi, at eins og tit eru luttakarar í líðingunum, soleiðis *skulu tit vera* eisini í troystini.
8 Tí at vit vildu ikki, brøður, havt tykkum óvitandi um okkara trongd, sum kom til okkum í Asiu, at vit vóru kroystir út um mark, uppum styrki, so mikið at vit *vóru* vónleysir enntá um lív:
9 Men vit høvdu deyðadómin í okkum sjálvum, at vit skuldu ikki líta á okkum sjálvar, men á Guð sum reisir *upp* hinar deyðu:
10 Hvør útfríaði okkum frá so miklum deyða, og útfríar: á hvønn vit líta, at hann vil enn útfría *okkum;*
11 Tit eisini saman hjálpandi við bøn fyri okkum, at fyri ta gávu, *veitt* uppá okkum við hjálp av mongum persónum, tøkkir mega verða veittar av mongum okkara vegna.
12 Tí at okkara fagnaður er hesin, vitnisburðurin av okkara samvitsku, at í einfaldni og gudiligum ærligleika, ikki í kjøtligum vísdómi, men við náði Guðs,

hava vit havt okkara atferð í heiminum, og meiri ríkiligani mótvegis tykkum.

13 Tí at vit skriva tykkum eingi onnur ting, enn tað *sum* tit lesa ella viðurkenna; og eg líti á, *at* tit skulu viðurkenna enntá til endan;

14 Sum tit eisini hava viðurkent okkum partvís, at vit eru tykkara fagnaður, enntá eins og tit eisini *eru* okkara á degi Harrans Jesu.

15 Og í hesum treysti var eg hugaður at koma til tykkara áður, at tit máttu fáa eina næstu góðgerð;

16 Og at fara umleiðis tykkum inn í Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ, og at koma aftur út úr Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ til tykkara, og av tykkum at verða førdur á mínum vegi ímóti Judæu.

17 Tá ið eg tí var soleiðis hugaður, brúkti eg gáloysni? ella tey ting sum eg ætli, ætli eg tey samsvarandi við kjøtið, at hjá mær tað skuldi verið ja, ja, og nei, nei?

18 Men *sum* Guð *er* sannur, var okkara orð mótvegis tykkum ikki ja og nei.

19 Tí at Sonur Guðs, Jesus Christus, sum varð prædikaður tykkara millum av okkum, *enntá* av mær og Sĭl-vā´-nŭs-i og Timotheusi, var ikki ja og nei, men í honum var ja.

20 Tí at allar Guðs fyrijáttanir í honum *eru* ja, og í honum Á´-měn, Guði til dýrdar viðˆ okkum.

21 Nú, hann sum grundfestir okkum við tykkum í Christi, og hevur salvað okkum, *er* Guð;

22 Hvør eisini hevur innsiglað okkum, og givið pant Andans í hjørtu okkara.

23 Harafturat kalli eg Guð til vitnis uppá mína sál, at *fyri* at spara tykkum kom eg ikki sum enn *er* til Corinth.

24 Ikki fyri tað *at* vit hava harradømi yvir tykkara trúgv, men eru hjálparar at tykkara gleði: tí at viðˆ trúgv standa tit.

KAPITUL 2

MEN eg setti hetta fyri hjá mær sjálvum, at eg vildi ikki koma aftur til tykkum í tyngd.

2 Tí at um eg geri tykkum syrgnar, hvør er hann tá, sum ger meg glaðan, uttan hin sami sum er gjørdur syrgin av mær?

3 Og eg skrivaði tykkum hetta sama, at ikki, tá ið eg kom, eg skuldi hava sorg frá teimum, um hvørjar eg átti at fegnast; havandi treyst á tykkum allar, at fagnaður mín er *fagnaður* tykkar alra.

4 Tí at út úr miklari líðing og hjartakvøl skrivaði eg tykkum við mongum tárum; ikki at tit skuldu verða harmaðir, men at tit máttu kenna kærleikan sum eg havi meiri ríkiligani til tykkara.

5 Men um nakar havi volt harm, *tá* hevur hann ikki harmað meg, uttan partvíst: at eg má ikki ovtyngja tykkum allar.

6 Nóg mikil fyri ein slíkan mann *er* henda revsing, sum *varð tillutað* av mongum.

7 Soleiðis at harafturímóti *áttu* tit heldur at fyrigeva *honum,* og ugga *hann,* at ikki møguligani ein slíkur skuldi verðið svølgdur upp av ovurmiklari sorg.

8 Hvørsvegna eg bøni tykkum, at tit vildu staðfesta *tykkara* kærleika mótvegis honum.

9 Tí at til hetta endamál skrivaði eg eisini, at eg mátti kenna prógvið um tykkum, hvørt tit veri lýdnir í øllum tingum.

10 Hvørjum tit fyrigevi nakað, eg *fyrigevi* eisini: tí at um eg fyrigav nakað, móti hvørjum eg fyrigav *tað,* fyri tykkara sakir *fyrigav eg tað* í persóni Christs;

11 At ikki Satan skuldi fingið fyrimun av okkum: tí at vit eru ikki óvitandi um hansara listarbrøgd.

12 Harafturat, tá eg kom til Trō´-ăs at *prædika* gleðiboðskap

Christs, og einar dyr vórðu upplatnar mær av Harranum,

13 Hevði eg onga hvíld í anda mínum, tí at eg fann ikki bróðir mín Titus: men, takandi mína farvælkvøðu við tey, fór eg haðani frá inn í Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ.

14 Nú, tøkk *veri* Guði, sum altíð veldur okkum at sigra í Christi, og ger eyðsýndan angan av sínum kunnleika við okkum í hvørjum plássi.

15 Tí at vit eru Guði ein søtur angi av Christi; í teimum sum eru frelstir, og í teimum sum glatast:

16 Fyri tí ēina *eru vit* angin av deyða til deyða; og fyri hīnum angin av lívi til lívs. Óg hvør *er* tilstrekkiligur til hesi ting?

17 Tí at vit eru ikki sum mangir sum spilla Guðs orð: men sum av ærligleika, men sum av Guði, í eygsjón Guðs tala vit í Christi.

KAPITUL 3

BYRJA vit aftur at geva okkum sjálvum viðmæli? ella tørvar okkum, sum summum *øðrum,* viðmælis-epistlar til tykkara, ella viðmælis-*brøv* frá tykkum?

2 Tit eru okkara epistil, skrivaður í hjørtu okkara, kendur og lisin av øllum monnum:

3 *Við tað at tit eru* eyðsýnligani kunngjørdir at vera epistil Christs, tænaður við okkum, skrivaður — ikki við blekki, men við Anda hins livandi Guðs; ikki í talvur av steini, men í kjøtugar talvur hjartans.

4 Og slíkt álit hava vit gjøgnum Christ mótvegis Guði:

5 Ikki at vit eru tilstrekkiligir av okkum sjálvum at hugsa nakað sum av okkum sjálvum; men okkara tilstrekkiligleiki *er* av Guði;

6 Hvør eisini hevur gjørt okkum dugandi tænarar av hinum nýggja testamenti; ikki bókstavsins, men andans: tí at bókstavurin drepur, men andin gevur lív.

7 Men um tæningin av deyða, skrivað *og* ískravað í steinar, var dýrdsom, so at Ísraels børn kundu ikki støðufastligani skoða andlitið á Mósesi fyri dýrdini av ásjón hansara; hvør *dýrd* varð at verða avtikin:

8 Hvussu skal ikki tæningin av andanum vera heldur dýrdsom?

9 Tí at um tæningin av fordøming *veri seg* dýrd, mikið meira ber tæningin av rættvísi av í dýrd.

10 Tí at enntá tað, sum varð gjørt dýrdsamt, hevði onga dýrd í hesum atliti, uppá grund av dýrdini sum ber av.

11 Tí at um tað, sum varð avtikið, *var* dýrdsamt, mikið meira tað, sum verður verandi, *er* dýrdsamt.

12 Við tað tá at vit hava slíka vón, nýta vit miklan greiðleika av talu:

13 Og ikki eins og Móses, *sum* setti eitt slør yvir sítt andlit, at Ísraels børn kundu ikki støðufastligani hyggja til enda tess, sum er avtikið:

14 Men teirra hugar vórðu blindaðir: tí at inntil henda dag er verandi hitt sama slørið, óburturtikið í lesingini av gamla testamentinum; hvørt *slør* verður tikið av í Christi.

15 Men enntá at hesum degi, tá ið Móses verður lisin, er slørið uppiá teirra hjarta.

16 Hóast hetta, tá ið tað skal venda til Harrans, skal slørið verða tikið burtur.

17 Nú, Harrin er tann Andin: og har, *sum* Andi Harrans *er,* har *er* frælsi.

18 Men vit allir, við opnum andliti, skoðandi sum í einum glari dýrd Harrans, verða umbroyttir í hina somu mynd frá dýrd til dýrd, *enntá* sum av Anda Harrans.

KAPITUL 4

TESSVEGNA, við tað at vit hava hesa tænastu, *so* sum vit hava fingið miskunn, falla vit ikki í fátt;

2 Men hava avsagt hinar fjaldu lutirnar av óærligleika, ikki gangandi í sniðfundni, ella handfarandi Guðs orð svikaligani; men við tilkennargeving av sannleikanum, gevandi okkum sjálvum viðmæli fyri samvitsku hvørs mans í eygsjón Guðs.

3 Men um okkara gleðiboðskapur veri *seg* huldur, er hann huldur fyri teimum ið eru burtvilstir:

4 Í hvørjum gudurin av hesum heimi hevur blindað hugarnar á teimum sum trúgva ikki, at ikki ljósið av dýrdsama gleðiboðskapi Christs, hvør er mynd Guðs, skuldi skína at teimum.

5 Tí at vit prædika ikki okkum sjálvar, men Christ Jesus Harran; og okkum sjálvar — tænarar tykkara fyri Jesu skuld.

6 Tí at Guð, sum skipaði ljósinum at skína út úr myrkri, hevur skinið í hjørtum okkara, til at *geva* ljósið av kunnleikanum til dýrd Guðs í andliti Jesu Christs.

7 Men vit hava henda dýrgrip í moldkerum, *fyri* at avbærleikin av kraftini má vera av Guði, og ikki av okkum.

8 *Vit eru* trongdir á hvørjari síðu, tó ikki neyðstaddir; *vit eru* ráðaleysir, men ikki í vónloysi;

9 Atsøktir, men ikki yvirgivnir; kastaðir niður, men ikki oyddir;

10 Altíð berandi umkring í likaminum doygging Harrans Jesu, at Jesu lív eisini mátti verða gjørt eyðsýnt í okkara likami.

11 Tí at vit, sum liva, verða alveg givnir upp til deyða fyri Jesu skyld, at Jesu lív eisini mátti verða gjørt eyðsýnt í okkara deyðiliga kjøti.

12 So virkar tá deyði í okkum, men lív í tykkum.

13 Vit, havandi hin sama trúarandan, samsvarandi við sum skrivað stendur, Eg trúði, og tí havi eg talað; vit eisini trúgva, og tí tala;

14 Vitandi, at hann, sum reisti upp Harran Jesus, skal reisa upp okkum eisini av Jesusi, og skal framstilla *okkum* við tykkum.

15 Tí at øll ting *eru* fyri tykkara sakir, at hin ríkiliga náðin mátti, gjøgnum takkarveiting mangra, føra til dýrd Guðs.

16 Fyri hvørja grund vit falla ikki í fátt; men tó *at* okkara útvortis maður farist, tó verður hin innvortis *maðurin* endurnýggjaður dag um dag.

17 Tí at okkara lætta líðing, sum er bert í eitt bil, virkar fyri okkum eina nógv meiri ovurhondsliga *og* æviga tyngd av dýrd;

18 Meðan vit hyggja, ikki at teim tingunum sum síggjast, men at teim tingunum sum ikki síggjast: tí at tingini sum síggjast *eru* tímilig; men tingini sum ikki síggjast *eru* ævig.

KAPITUL 5

TÍ at vit vita, at um okkara jarðiska hús av *hesum* tabernakli varð upployst, hava vit ein bygning frá Guði, eitt hús — ei gjørt við hondum, ævigt í himnunum.

2 Tí at í hesum stynja vit, inniliga tráandi at verða klæddir uppá við okkara húsi sum er frá himni:

3 Um so veri, at verðandi klæddir, vit skulu ei verða funnir naknir.

4 Tí at vit, sum eru í *hesum* tabernakli, stynja, verandi tyngdir: ikki fyri tað, *at* vit vildu verðið klæddir av, men klæddir uppá, at deyðiligleiki mátti verða svølgdur upp av lívi.

5 Nú, hann, sum hevur virkað okkum fyri sjálvt hetta sama, *er* Guð, sum eisini hevur givið okkum pant Andans.

6 Tí *eru vit* altíð sannførir, vitandi, at meðan vit eru heima í likaminum, eru vit fráverandi frá Harranum:
7 (Tí at vit ganga viðˆ trúgv, ikki viðˆ skoðan:)
8 Vit eru sannførir, *sigi eg,* og viljugir heldur at vera fráverandi frá likaminum, og at vera hjáverandi hjá Harranum.
9 Hvørsvegna vit streva, at, hvørt hjáverandi ella fráverandi, vit mega vera góðtiknir av honum.
10 Tí at vit mega allir birtast frammi fyri dómstóli Christs; at hvør *og* ēin má móttaka tingini, *gjørd* í likami *hansara,* samsvarandi við tað *sum* hann hevur gjørt, hvørt *tað veri seg* gott ella ilt.
11 Kennandi tessvegna ræðslu Harrans, yvirtala vit menn; men vit eru gjørdir opinlýsir Guði; og eg líti á eisini eru gjørdir opinlýsir í samvitskum tykkara.
12 Tí at vit geva ikki okkum sjálvum aftur viðmæli at tykkum, men geva tykkum høvi til at rósa *tykkum* okkara vegna, at tit mega hava eitthvørt at *svara* teimum sum rósa *sær* í útsjónd, og ikki í hjarta.
13 Tí at hvørt vit veri frá okkum sjálvum, *er tað* fyri Guði: ella hvørt vit veri edrúiligir, *er tað* fyri tykkara skuld.
14 Tí at kærleiki Christs noyðir okkum; av tí at vit svá døma, at um ēin doyði fyri allar, tá vórðu allir deyðir:
15 Og *at* hann doyði fyri allar, *fyri* at teir, sum liva, skuldu ikki hiðanífrá liva sær sjálvum, men honum sum doyði fyri teir, og reis aftur.
16 Hvørsvegna hiðanífrá kenna vit ongan mann eftir kjøtinum: ja, tó *at* vit hava kent Christ eftir kjøtinum, tó nú hiðanífrá kenna vit *hann* ei meira.
17 Tessvegna, um nakar maður *veri* í Christi, *hann er* ein nýggjur skapningur: gamlir lutir eru farnir burtur; sí, allir lutir eru vorðnir nýggir.
18 Og allir lutir *eru* av Guði, sum hevur endursónað okkum til sín sjálvs viðˆ Jesusi Christi, og hevur givið til okkum endursóningar-tænastuna;
19 Tað vil siga, at Guð var í Christi, endursónandi heimin til sín sjálvs, ei tilroknandi teimum teirra misgerðir; og hevur litið okkum upp í hendur endursóningar-orðið.
20 Nú eru vit tá umboðsmenn fyri Christ, sum um Guð bønaði *tykkum* viðˆ okkum: vit biðja *tykkum* í staði Christs, verðið tit endursónaðir til Guðs.
21 Tí at hann hevur gjørt hann *at vera* synd fyri okkum, sump kendi onga synd; *fyri* at vit máttu verða gjørdir rættvísi Guðs í honum.

KAPITUL 6

VIT tá, *sum* verkamenn saman *við honum,* bøna *tykkum* eisini, at tit taki ikki ímóti Guðs náði til einkiðs.
2 (Tí at hann sigur, Eg havi hoyrt teg á eini lagaligari tíð, og á frelsudeginum havi eg *verið* tær til hjálpar: sí, nú *er* lagaliga tíðin; sí, nú *er* frelsudagurin.)
3 Gevandi ongan meinboga í nøkrum luti, at tænastan verði ikki lastað:
4 Men í øllum *lutum* prógvandi okkum sjálvar sum tænarar Guðs, í miklum tolmóði, í líðingum, í neyðsynjum, í neyðum,
5 Í sløgum, í fongslingum, í ófriðum, í strevum, í vøkum, í føstum;
6 Viðˆ skírleika, viðˆ kunnleika, viðˆ langmóði, viðˆ blíðsemi, viðˆ Halga Andanum, viðˆ kærleika ófalsaðum,

7 Við sannleiks-orðinum, við kraft Guðs, við herklæðum rættvísinnar til høgru handar og til vinstru,
8 Við æru og vanæru, við illari umtalu og góðari umtalu: sum villleiðarar, og *tó* sannir;
9 Sum ókendir, og *tó* væl kendir; sum doyggjandi, og sí, vit liva; sum agaðir, og ikki dripnir;
10 Sum sorgarfullir, tó alvegis fagnandi; sum fátækir, tó gerandi mangar ríkar; sum havandi einkið, og *tó* eigandi øll ting.
11 O *tit* Corintharar, okkara munnur er upplatin at tykkum, okkara hjarta er útvíðkað.
12 Tit eru ikki trengdir í okkum, men tit eru trengdir í tykkar egnu *vælvildar*goymslum.
13 Nú, fyri eina endurgjalding í hinum sama, (eg tali sum við børn *míni,*) verðið tit eisini útvíðkaðir.
14 Verið tit ikki ójavnligani okaðir saman við vantrúgvandi: tí at hvønn felagskap hevur rættvísi við órættvísi? og hvat samfelag hevur ljós við myrkur?
15 Og hvønn samklang hevur Christus við Bế-lĭ-ăl? ella hvønn part hevur hann, sum trýr, við einum vantrúgvandi?
16 Og hvørja seming hevur Guðs tempul við skurðgudar? tí at tit eru tempul hins livandi Guðs; eins og Guð hevur sagt, Eg vil búgva í teimum, og ganga í *teimum;* og eg vil vera Guð teirra, og tey skulu vera fólk mítt.
17 Hvørsvegna komið út frá ímillum teirra, og verið tit atskild, sigur Harrin, og nemið ikki við hin óreina *lut;* og eg vil taka ímóti tykkum,
18 Og eg vil vera tykkum Faðir, og tit skulu vera synir mínir og døtur, sigur Harrin Almáttugi.

KAPITUL 7

HAVANDI tessvegna hesar fyrijáttanir, kærliga elskaðu, latum okkum reinsa okkum sjálvar frá allari óreinsku kjøtsins og anda, fullkomnandi heilagleika í ótta Guðs.
2 Takið ímóti okkum; vit hava ongan mann órættað, vit hava ongan mann spilt, vit hava ongan mann snýtt.
3 Eg tali ikki *hetta* fyri at fordøma *tykkum:* tí at eg havi áður sagt, at tit eru í okkara hjørtum til at doyggja og liva við *tykkum.*
4 Mikil *er* mín talu-djarvleiki mótvegis tykkum, mikil *er* mín rósan av tykkum: eg eri fyltur við uggan, eg eri ovurhonds fegin í øllum okkara trongslum.
5 Tí, tá ið vit vóru komnir inn í Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ, hevði okkara kjøt onga hvíld, men vit vóru trongdir á hvørjari síðu; fyri uttan *vóru* stríð, fyri innan *vóru* óttar.
6 Hóast hetta Guð, sum uggar teir sum eru niðurboygdir, uggaði okkum við komu Titusar;
7 Og ikki við hansara komu einans, men við teirri troyst, við hvørji hann varð uggaður í tykkum, tá ið hann segði okkum frá tykkara inniligu tráan, tykkara venan, tykkara brennandi huga mótvegis mær; so at eg frøddist tess meira.
8 Tí at tó *at* eg gjørdi tykkum syrgnar við einum brævi, *so* iðrist eg ikki, tó *at* eg iðraðist: tí at eg varnist, at hin sami epistilin hevur gjørt tykkum syrgnar, tó *at tað var* bert í eina tíð.
9 Nú fegnist eg, ikki at tit vórðu gjørdir syrgnir, men at tit syrgdu til umvendingar: tí at tit vórðu gjørdir syrgnir eftir gudligum háttarlagi, at tit máttu fáa skaða av okkum í ongum.
10 Tí at gudlig sorg virkar umvending til frelsu, ikki til at verða iðrað um: men sorg heimsins virkar deyða.
11 Tí at skoðið sjálvt hetta sama ting, at tit syrgdu eftir gudligum slagi, hvat ídni tað virkaði

í tykkum, ja, *hvørja* reinsan av tykkum sjálvum, ja, *hvørja* harmavreiði, ja, *hvønn* ótta, ja, *hvørja* ógvusliga tráan, ja, *hvat* vandlæti, ja, *hvørja* hevnd! Í øllum *tingum* hava tit prógvað tykkum sjálvar at vera reinar í hesi søk.

12 Hvørsvegna, tó *at* eg skrivaði til tykkara, *gjørdi eg tað* ikki hansara vegna sum hevði gjørt órættin, ella hansara vegna sum leið órætt, men *fyri* at okkara umsorgan fyri tykkum í eygsjón Guðs mátti sýnast tykkum.

13 Tí vórðu vit uggaðir í tykkara uggan: ja, og ovurhondsliga tess meira gleddust vit yvir gleði Titusar, av tí at andi hansara varð endurfrískaður av tykkum øllum.

14 Tí at um eg havi rósað nakað ting fyri honum um tykkum, *so* skammist eg ikki; men eins og vit talaðu øll ting til tykkara í sannleika, enntá soleiðis er rósan okkara, sum *eg gjørdi* frammi fyri Titusi, funnin sannleiki.

15 Og hansara innvortis alskur er meira ríkiligur mótvegis tykkum, meðan hann minnist lýdnið hjá tykkum øllum, hvussu við ótta og bivan tit tóku ímóti honum.

16 Eg fegnist tessvegna, at eg havi álit á tykkum í øllum *tingum*.

KAPITUL 8

HARAFTURAT, brøður, vit fáa tykkum at vita um ta náði Guðs, givin á Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ-kirkjurnar;

2 Hvussu ið í eini miklari líðingar-roynd yvirflóðin av teirra gleði og teirra djúpu armóð ríkaðist til ríkdómarnar av teirra gávumildni.

3 Tí at til *teirra* kraft, eg gevi vitnisburð, ja, og útum *teirra* kraft *vóru teir* viljugir av sær sjálvum;

4 Biðjandi okkum, við miklari bønan, at vit vildu tikið við gávuni, og *taka uppá okkum* felagskapin av tæningini til hini heilagu.

5 Og *hetta gjørdu teir*, ikki sum vit vónaðu, men góvu fyrst sjálvt seg sjálvar til Harrans, og innat okkum við^ vilja Guðs.

6 So mikið, at vit ynsktu *av* Titusi, at eins og hann hevði byrjað, soleiðis vildi hann eisini fullføra í tykkum hina somu náði eisini.

7 Tessvegna, eins og tit eru ríkir í øllum *tingum, í* trúgv, og mælsku, og kunnleika, og *í* øllum íðinskapi, og *í* tykkara kærleika til okkara, *siggið til* at tit eru ríkir í hesi náði eisini.

8 Eg tali ikki av boði, men av tilevni av íðinskapinum hjá øðrum, og *fyri* at royna ærligleikan av tykkara kærleika.

9 Tí at tit kenna náði várs Harra Jesu Christs, at hóast hann var ríkur, tó fyri tykkara sakir gjørdist hann fátækur, *fyri* at tit, gjøgnum hansara fátækt, máttu verða ríkir.

10 Og í hesum gevi eg *míni* ráð: tí at hetta er gagnligt fyri tykkum, sum áður hava byrjað, ikki bert at gera, men eisini at vera ídnir *fyri* einum ári síðani.

11 Nú tessvegna, útinnið geringina *av tí;* at eins og *tað var* ein fúsleiki til at vilja, soleiðis *tað má verða* ein fremjing eisini út av tí sum tit hava.

12 Tí at um tað veri *seg* fyrst ein viljugur hugur, *so er tað* góðtikið samsvarandi við tað ein maður hevur, *og* ikki samsvarandi við tað hann ikki hevur.

13 Tí at *eg meini* ikki, at aðrir menn verði lættir um, og tit byrðaðir:

14 Men við^ eini javnsemi, *at* nú á hesi tíð tykkara ríkiligsemi *má verða ein veitan* fyri teirra trot, at teirra ríkiligsemi eisini má verða *ein veitan* fyri tykkara trot: at tað má verða javnsemi:

15 Sum skrivað stendur, Hann, ið *hevði savnað* mikið, hevði einkið *til* yvirs; og hann, ið *hevði savnað* lítið, hevði einkið trot.

16 Men tøkk *veri* til Guðs, sum legði hina somu inniligu umsorgan inn í hjarta Titusar fyri tykkum.
17 Tí at vissuliga tók hann ímóti áminningini; men, verandi meira iðin, av sínum egnu eintingum fór hann til tykkara.
18 Og vit hava sent við honum bróðurin, hvørs lov *er* í gleðiboðskapinum út gjøgnum allar kirkjurnar;
19 Og ikki einans *tað,* men sum eisini varð valdur av kirkjunum at ferðast við okkum við hesi náði, sum er umsitin av okkum til dýrdar hins sama Harra, og *yvirlýsing av* tykkara fúsa huga:
20 Skýggjandi hetta, at eingin maður skuldi lastað okkum í hesum ríkiligleika, sum er umsitin av okkum:
21 Skaffandi fyri ærligum tingum, ikki einans í eygsjón Harrans, men eisini í eygsjón manna.
22 Og vit hava sent við teimum okkara bróður, sum vit mangan hava roynt dúgligan í mongum tingum, men nú mikið meira dúgligan, uppá hitt mikla álitið sum *eg havi* á tykkum.
23 Hvørt *nakar fregnist* um Titus, *hann er* mín felagi og medhjálpari viðvíkjandi tykkum: ella okkara bróður *verði fregnaðir um, teir eru* sendiboðini hjá kirkjunum, *og* dýrd Christs.
24 Hvørsvegna sýnið tit til teirra, og frammi fyri kirkjunum, prógvið um tykkara kærleika, og um okkara rósan tykkara vegna.

KAPITUL 9

TÍ at hvat tænastuna til hini heilagu nertir, er tað ótørvandi hjá mær at skriva til tykkara:
2 Tí at eg kenni íðinskapin av hugi tykkara, fyri hvat eg rósi um tykkum fyri teimum úr Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ, at Á-chāĭ´-ă var tilreiðar fyri einum ári síðani; og tykkara vandlæti hevur eggjað sera mongum *til.*
3 Tó havi eg sent brøðurnar, at ikki okkara rósan av tykkum skuldi verða til fánýtis í hesum máli; *fyri* at tit, eins og eg segði, mega vera tilreiðar:
4 At ikki, av hendingi, tey úr Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ komi við mær, og finni tykkum ófyrireikaðar, vit, (at vit sigi ikki, tit,) skuldu verðið til skammar í hesi somu sannføru rósan.
5 Tí helt eg tað neyðugt at formana brøðurnar, at teir vildu fara undan til tykkara, og frammanundan skipa fyri tykkara gávumildni, hvarum tit fingu fráboðan frammanundan, at tað sama mátti vera tilreiðar, sum *ein søk av* gávumildni, og ikki sum *av* havisjúku.
6 Men hetta *sigi eg,* Hann, ið sparsamligani sáar, skal eisini sparsamligani heysta; og hann, sum ríkiligani sáar, skal eisini ríkiligani heysta.
7 Hvør maður samsvarandi sum hann setur *sær* fyri í sínum hjarta, *soleiðis lat hann geva;* ikki treyðugliga, ella av neyðsyn: tí at Guð elskar ein glaðan gevara.
8 Og Guð *er* mentur at elva allari náði *at* vera ríkilig mótvegis tykkum; at tit, altíð havandi allan tilstrekkiligleika í øllum *lutum,* mega vera ríkiligir til hvørt gott verk:
9 (Sum skrivað stendur, Hann hevur stroytt útumkring; hann hevur givið til tey fátæku: hans rættvísi verður verandi um ævir.
10 Nú, hann, sum tænir sáð til sáðmannin, tæni bæði breyð til *tykkara* mat, og margfaldi tykkara sáaða sáð, og nøri um ávøkstirnar av tykkara rættvísi;)
11 Verðandi uppríkaðir í øllum tingum til alla gávumildni, sum elvir, ígjøgnum okkum, takkarveitan til Guðs.
12 Tí at umsitingin av hesi tænastu bøtir ikki einans um trot teirra heilagu, men er ríkilig eisini við mongum takkarveitanum til Guðs;

13 Meðan, viðˆ sannroyndini av hesi tænastu, teir dýrðmeta Guð fyri tykkara váttaðu undirgivni yvirfyri gleðiboðskapi Christs, og fyri *tykkara* rundhondaðu útdeilan til teirra, og til alra *manna;*
14 Og viðˆ teirra bøn fyri tykkum, hvørjum leingist eftir tykkum fyri hina ovurhonds náði Guðs í tykkum.
15 Tøkk *veri* Guði fyri hansara ómæliligu gávu.

KAPITUL 10

NÚ, eg, Paulus, sjálvur bøni tykkum viðˆ eyðmjúkleika og mildsemi Christs, sum í hjástøðu *eri* vesæligur tykkara millum, men verandi frástaddur eri djarvur mótvegis tykkum:
2 Men eg bøni *tykkum,* at eg má ikki vera djarvur, tá ið eg eri hjástaddur, við tí treysti, hvarvið eg hugsi at vera djarvur ímóti summum, sum hugsa um okkum sum um vit gingu samsvarandi við kjøtið.
3 Tí at tó *at* vit gangi í kjøtinum, *so* kríggja vit ikki eftir kjøtinum:
4 (Tí at vápnini av okkara kríggsførslu *eru* ikki kjøtlig, men máttug gjøgnum Guð til at toga niður vígvirkir;)
5 Kastandi niður ímyndanir, og hvørt høgt ting sum upphevjar seg sjálvt ímóti kunnleika Guðs, og førandi inn í fangaskap hvørja hugsan til lýdnis Christs;
6 Og havandi í einum fúsleika at hevna alla ólýdni, tá ið tykkara lýdni er uppfylt.
7 Hyggja tit at tingum eftir hini útvortis útsjónd? Um nakar maður líti til sín sjálvs at hann er Christs, lat hann um seg sjálvan hugsa hetta aftur, at eins og hann *er* Christs, enntá soleiðis *eru* vit Christs.
8 Tí at tó *at* eg skuldi rósað eitthvørt meira av okkara myndugleika, sum Harrin hevur givið okkum til uppbygging, og ikki til tykkara oyðilegging, skuldi eg ikki verðið til skammar:
9 At eg ikki má tykjast sum um eg vildi ræða tykkum viðˆ brøvum.
10 Tí at *hansara* brøv, siga teir, *eru* tunglig og kraftfør; men *hansara* likamliga nærvera *er* veik, og *hansara* tala vanvirðislig.
11 Lat ein slíkan hugsa hetta, at slíkir, sum vit eru í orði viðˆ brøvum tá ið vit eru frástaddir, slíkir *vilja vit vera* eisini í gerð tá ið vit eru hjástaddir.
12 Tí at vit vága ikki *at* gera okkum sjálvar av talinum, ella sammeta okkum sjálvar við summar sum geva sær sjálvum viðmæli: men teir, mátandi seg sjálvar við seg sjálvar, og berandi seg sjálvar saman sín ámillum, eru ikki vísir.
13 Men vit vilja ikki rósa *okkum* av tingum uttanfyri *okkara* mát, men samsvarandi við mátið av teirri mátilinju sum Guð hevur tilskilað okkum, eitt mát at røkka enntá at tykkum.
14 Tí at vit toyggja ikki okkum sjálvar útum *okkara mát,* sum um vit rukku ikki at tykkum: tí at vit eru komnir so langt sum til tykkara eisini í at *prædika* gleðiboðskap Christs:
15 Ei rósandi av tingum uttanfyri *okkara* mát, *tað er,* av arbeiðum annara manna; men, havandi vón, tá ið tykkara trúgv er økt, at vit skulu verða vaksnir um av tykkum samsvarandi við okkara *mát*linju ríkiliga,
16 At prædika gleðiboðskapin í *umráðunum* handan tykkum, *og* ikki at rósa í annars mans linju av tingum, gjørd tilreiðar okkum til handar.
17 Men hann, sum rósar *sær,* lat hann rósa *sær* í Harranum.
18 Tí at ikki hann, ið gevur sær sjálvum viðmæli, er viðurkendur, men hvørjum Harrin gevur viðmæli.

KAPITUL 11

GÆVI Guð, tit kundu borið yvir við mær eitt sindur í *mínum* dárskapi: og víst berið yvir við mær.

2 Tí at eg eri ástbrellin yvir tykkum við gudligari ástbrelni: tí at eg havi trúlovað tykkum við ēinum ektamanni, *fyri* at eg má framstilla *tykkum sum* eina kýska jomfrú til Christs.

3 Men eg kvíði *fyri,* bara ikki við nøkrum brøgdum, eins og høggormurin tøldi Evu gjøgnum sniðfundni sína, soleiðis tykkara hugar skuldu verðið spiltir frá einfaldleikanum sum er í Christi.

4 Tí at um hann, sum kemur, prædikar ein annan Jesus, hvønn vit hava ikki prædikað, ella *um* tit fáa ein annan anda, hvønn tit hava ikki fingið, ella ein annan gleðiboðskap, hvørjum tit hava ikki tikið ímóti, tit máttu væl borið *yvir* við *honum.*

5 Tí at eg haldi, *at* eg var ikki eitt vet aftanfyri sjálvastu hinar fremstu ápostlarnar.

6 Men tó *at eg veri meg* ráur í talu, tó ikki í kunnleika; men vit eru vorðnir reiðiligani gjørdir eyðsýndir tykkara millum í øllum tingum.

7 Havi eg framt eitt misbrot í at lækka meg sjálvan, at tit máttu verða upphevjaðir, av tí at eg havi prædikað fyri tykkum gleðiboðskap Guðs fyri einkið?

8 Eg rændi aðrar kirkjur, takandi *av teimum* løn, *fyri* at gera tykkum tænastu.

9 Og tá ið eg var hjástaddur hjá tykkum, og tørvaði, var eg ongum manni kravsamur: tí at tað, sum var tørvandi hjá mær, bøttu brøðurnir, sum komu frá Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ, um: og í øllum *tingum* havi eg hildið meg frá at vera tykkum byrðusamur, og *soleiðis* vil eg halda *meg.*

10 Sum sannleiki Christs er í mær, skal eingin maður steðga mær í hesi rósan í umráðunum av Â-chāĭ´-ŭ.

11 Hvørsvegna? av tí at eg elski tykkum ikki? Guð veit.

12 Men tað, *sum* eg geri, tað vil eg gera, at eg kann avskera tilevni frá teimum sum tráa tilevni; til *tess* at í hvørjum teir rósa *sær,* teir mega verða funnir enntá sum vit.

13 Tí at slíkir *eru* falskir ápostlar, svikafullir verkamenn, umbroytandi seg sjálvar í ápostlar Christs.

14 Og eingin undran; tí at Satan sjálvur umbroytist í ein ljóseingil.

15 Tí *er tað* einkið mikið ting, um hansara tænarar eisini verði umbroyttir sum tænarar rættvísinnar; hvørs endi skal verða samsvarandi við teirra verk˘.

16 Aftur sigi eg, Lat ongan mann halda meg ein dára; um øðrvísi, tó sum einum dára takið ímóti mær, at eg sjálvur má rósa *mær* eitt sindur.

17 Tað, sum eg tali, *tað* tali eg ikki eftir Harranum, men sum var tað fávitskuligani, í hesum treysti av rósan.

18 Við tað at mangir rósa *sær* eftir kjøtinum, vil eg eisini rósa *mær.*

19 Tí at tit tola dárar gleðiliga, við tað at tit *sjálvir* eru vísir.

20 Tí at tit tola *tað,* um ein maður føri tykkum inn í trældóm, um ein maður uppeti *tykkum,* um ein maður taki *frá tykkum,* um ein maður upphevji seg sjálvan, um ein maður slái tykkum á andlitið.

21 Eg tali sum viðvíkjandi skomm, sum um vit høvdu verið veikir. Hvussu enn er, í hvørjumsumhelst nakar er djarvur, (eg tali fávitskuliga,) eg eri djarvur við.

22 Eru teir Hebrēarar? eg *tað* við. Eru teir Ísraelitar? eg *tað* við. Eru teir sáð Ábrahams? eg *eri* við.

23 Eru teir tænarar hjá Christi? (eg tali sum ein dári) eg *eri tað*

meira; í strevum meira ríkiliga, í fleingjum uppum mát, í fongslum meira tíðum, í deyðs*vandum* ofta.

24 Av Jødunum fimm ferðir fekk eg fjøruti *fleingjur,* frároknað ēina.

25 Trærreisur varð eg bardur við stavum, ēina ferð varð eg steinaður, tríggjar ferðir leið eg skipbrot, eina nátt og ein dag havi eg verið í djúpinum;

26 *Í* ferðingum ofta, *í* vandum av vøtnum, *í* vandum av ránsmonnum, *í* vandum av *mínum egnu* landsmonnum, *í* vandum av teimum heidnu, *í* vandum í staðinum, *í* vandum í oyðuni, *í* vandum í sjónum, *í* vandum millum falsbrøður;

27 Í møðsemi og pínufullsemi, í vøkum ofta, í hungri og torsta, í føstum ofta, í kulda og nakni.

28 Umframt tey tingini, sum *her* koma afturat, tað, sum kemur uppá meg dagliga, umsorganin fyri øllum kirkjunum.

29 Hvør er veikur, og eg eri ikki veikur? hvør fær meinboga, og eg brenni ikki?

30 Um eg má endiliga rósa *mær,* vil eg rósa *mær* av teimum tingunum sum viðvíkja veikleikum mínum.

31 Guð og Faðir várs Harra Jesu Christs, sum er vælsignaður um ævirmeir, veit, at eg lúgvi ikki.

32 Í Damascus helt landsstjórin undir Ăr-ē´-tās kongi vakt um stað Dâ-măs-çēn´-aranna við einum setuliði, tráiligur at handtaka meg:

33 Og ígjøgnum ein glugga í eini kurv varð eg sigin niður við múrin, og komst undan hondum hansara.

KAPITUL 12

TAÐ er ikki gagnligt hjá mær, óivað, at rósa *mær.* Eg vil koma til sjónir og opinberingar frá Harranum.

2 Eg kendi ein mann í Christi, yvir fjúrtan ár síðani, (hvørt í likaminum, eg dugi ikki at siga; ella hvørt úti úr likaminum, eg dugi ikki at siga: Guð veit;) ēin slíkan — ryktan upp til hins triðja himins.

3 Og eg kendi ein slíkan mann, (hvørt í likaminum, ella úti úr likaminum, eg dugi ikki at siga: Guð veit;)

4 Hvussu ið hann varð ryktur upp inn í pāradís, og hoyrdi ósiganlig orð, sum tað er ikki loyviligt hjá einum manni at mæla.

5 Av einum slíkum vil eg rósa *mær:* tó av mær sjálvum vil eg ikki rósa *mær,* uttan í veikleikum mínum.

6 Tí at tó *at* eg vildi tráað at rósa *mær,* skal eg ei vera ein dári; tí at eg vil siga sannleikan: men *nú* lati eg vera, at ikki nakar maður skuldi hugsað um meg uppum tað sum hann sær meg *at vera,* ella *tað* hann hoyrir av mær.

7 Og *fyri* at ikki eg skuldi verða upphevjaður uppum mát, gjøgnum ríkiligleikan av opinberingunum, varð tað givin til mín ein tornur í kjøtið, sendiboð Satans at banka meg, at ikki eg skuldi verða upphevjaður uppum mát.

8 Fyri hetta tingið bað eg Harran trærreisur, at hann mátti fara burtur frá mær.

9 Og hann segði við meg, Mín náði er tilstrekkilig hjá tær: tí at máttur mín verður gjørdur fullkomin í veikleika. Mest gleðiliga, tessvegna, vil eg heldur rósa mær í mínum veikleikum, *fyri* at kraft Christs má hvíla uppiá mær.

10 Tí havi eg hugnað í veikleikum, í brigslanum, í trongstøðum, í atsóknum, í angistum fyri Christi skuld: tí at tá ið eg eri veikur, tá eri eg sterkur.

11 Eg eri vorðin ein dári í rósan; tit hava noytt meg: tí at eg átti at havt verðið viðmæltur av tykkum: tí at í ongum luti eri eg aftanfyri sjálvastu hinar fremstu

ápostlarnar, tó at eg veri *meg* einkið.

12 Sanniliga, teknini av einum ápostli vórðu virkaði tykkara millum í øllum tolmóði, í teknum, og undrum, og mektigum gerningum.

13 Tí at hvat er tað, í hvørjum tit vóru niðarligari enn aðrar kirkjur, uttan *tað veri seg* at eg sjálvur var ikki tyngslusamur fyri tykkum? fyrigevið mær henda órætt.

14 Sí, tað triðja skiftið eri eg tilreiðar at koma til tykkara; og eg vil ikki verða tyngslusamur fyri tykkum: tí eg søki ikki tykkara, men tykkum: tí at børnini áttu ikki at leggja niðurfyri til foreldrini, men foreldrini til børnini.

15 Og eg vil sera fegin brúka og verða brúktur fyri tykkum; tó jú meira ríkiliga eg elski tykkum, jú minni verði eg elskaður.

16 Men veri tað so, eg byrðaði ikki tykkum: hóast hetta, verandi listinlærdur, *so* fangaði eg tykkum við snildi.

17 Gjørdi eg vinning av tykkum við nøkrum av teimum sum eg sendi til tykkara?

18 Eg bað Titus, og við *honum* sendi eg ein bróður. Gjørdi Titus vinning av tykkum? gingu vit ikki í hinum sama anda? *gingu vit* ikki í hinum somu fótafetum?

19 *Upp*aftur, halda tit, at vit umbera okkum yvirfyri tykkum? vit tala frammi fyri Guði í Christi: men *vit gera* allar lutir, kærliga elskaðu, fyri tykkara uppbygging.

20 Tí at eg óttist, bara ikki, tá eg komi, skal eg ikki finna tykkum slíkar sum eg vildi, og *at* eg skal verða funnin tykkum slíkur sum tit vildu ikki: bara ikki *tað verði* trætnaðir, øvundanir, vreiðir, flokkadráttir, bakbítanir, sleyanir, uppblásanir, ófriðir:

21 *Og* bara ikki, tá ið eg komi aftur, Guð mín vil eyðmjúkgera meg tykkara millum, og *at* eg skal gráta um mangar sum hava syndað longu, og hava ikki vent um frá teirri óreinsku og siðloysi og skendsku sum teir hava framt.

KAPITUL 13

1 HETTA *er* hitt triðja *skiftið*, eg komi til tykkara. Við munninum á tveimum ella trimum vitnum skal hvørt orð verða grundfest.

2 Eg segði tykkum áður, og fyrifram sigi tykkum, sum um eg var hjástaddur, í annað skiftið; og verandi frástaddur nú skrivi eg til teirra sum herframmanundan hava syndað, og til øll hini, sum, um eg komi aftur, vil eg ikki eira:

3 Við tað at tit søkja eitt prógv av Christi, talandi í mær, sum mótvegis tykkum er ikki veikur, men er mektigur í tykkum.

4 Tí at tó *at* hann varð krossfestur gjøgnum veikleika, tó livir hann við kraft Guðs. Tí at vit eisini eru veikir í honum, men vit skulu liva við honum við kraft Guðs mótvegis tykkum.

5 Kannið tykkum sjálvar, hvørt tit veri í trúnni; roynið tykkum sjálvar. Kenna tit ikki sjálvastir sjálvir, hvussu ið Jesus Christus er í tykkum, uttan tit veri afturrekingar?

6 Men eg líti á, at tit skulu kenna, at vit eru ikki afturrekingar.

7 Nú, eg biði til Guðs, at tit geri einkið ilt; ikki at vit skuldu sýnast viðurkendir, men at tit skuldu gera tað sum er ærligt, tó *at* vit veri sum afturrekingar.

8 Tí at vit kunnu einkið gera ímóti sannleikanum, men fyri sannleikanum.

9 Tí at vit eru glaðir, tá ið vit eru veikir, og tit eru sterkir: og hetta eisini ynskja vit, *enntá* tykkara fullkomning.

10 Tí skrivi eg hesi tingini, verandi frástaddur, at ikki, verandi hjástaddur, eg skuldi brúkt hvassleika, samsvarandi við máttin

sum Harrin hevur givið mær til uppbyggingar, og ikki til oyðileggingar.

11 Til endans, brøður, farvæl. Verið fullkomnir, verið við góða uggan, verið av einum huga, livið í friði; og Guð kærleiks og friðar skal vera við tykkum.

12 Heilsið hvør øðrum við heilagum kossi.

13 Allir hinir heilagu lata heilsa tykkum.

14 Náði Harrans Jesu Christs, og kærleiki Guðs, og samfelag Halga Andans, *veri* við tykkum øllum. Á-měn.

¶ Hin seinni *epistilin* til Corintharanna varð skrivaður frá Philippi, *einum staði* av Mā-cĕ-dŏ-nī-ŭ, av Titusi og Lucasi.

EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS TIL GALATARANNA.

KAPITUL 1

PAULUS, ein ápostul, (ikki av monnum, eiheldur við^ manni, men við^ Jesusi Christi, og Guði Faðirinum, sum reisti hann frá teimum deyðu;)

2 Og allir brøðurnir sum við mær eru, til kirkjurnar av Galatiu:

3 Náði *veri* til tykkara og friður frá Guði Faðirinum, og *frá* Harra várum Jesusi Christi,

4 Hvør gav seg sjálvan fyri okkara syndir, at hann mátti útfría okkum frá hesi núverandi illu verøld, samsvarandi við vilja Guðs og Faðirs várs:

5 Til hvørs *veri* dýrd um ævir og ævir. Á-měn.

6 Eg undrist *á,* at tit so skjótt eru burtfluttir frá honum sum kallaði tykkum inn í náði Christs, at einum øðrum gleðiboðskapi:

7 Sum ikki er ein annar; men tað veri summir sum órógva tykkum, og vildu spilt gleðiboðskap Christs.

8 Men tó *at* vit, ella ein eingil frá himni, prædiki tykkum nakran annan gleðiboðskap enn tann, sum vit hava prædikað tykkum, veri hann bannaður.

9 Eins og vit søgdu áður, so sigi eg nú aftur, Um nakar *maður* prædiki tykkum nakran annan gleðiboðskap enn tann, tit hava tikið við, veri hann bannaður.

10 Tí at yvirtali eg nú menn, ella Guð? ella søki eg at toknast monnum? tí at um eg enn toknist monnum, skuldi eg ikki verið tænari Christs.

11 Men eg vissi tykkum *um,* brøður, at gleðiboðskapurin, sum varð prædikaður av mær, er ikki eftir manni.

12 Tí at eg hvørki móttók hann av manni, eiheldur varð eg lærdur *hann,* men við^ opinbering Jesu Christs.

13 Tí at tit hava hoyrt um mína framferð í farnari tíð í átrúnaði Jødanna, hvussu ið framum mát eg søkti at kirkju Guðs, og oyddi hana:

14 Og gagnaði í átrúnaði Jødanna uppum mangar mínar javningar í míni egnu tjóð, verandi meiri ovurhondsligani vandlátur um siðir fedra mína.

15 Men tá ið tað hóvaði Guði, sum tilskilaði meg frá móðurlívi móður mínar, og kallaði *meg* við^ náði síni,

16 At opinbera Son sín í mær, at eg mátti prædika hann millum hinna heidnu; alt fyri eitt ráðførdist eg ikki við kjøt og blóð:

17 Eiheldur fór eg niðan til Jerusalem til teirra sum vóru ápostlar undan mær; men eg fór inn í Arabiu, og kom aftur aftur til Damascus.
18 So, eftir trý ár, fór eg niðan til Jerusalem at hitta Pætur, og varð hjá honum fimtan dagar.
19 Men aðrar av ápostlunum sá eg ongan, uttan Jákob, bróður Harrans.
20 Nú, tey tingini sum eg skrivi til tykkara, sí, frammi fyri Guði, eg lúgvi ikki.
21 Síðan kom eg inn í umráðini av Sýriu og Çí-lí´-çí-ŭ;
22 Og var ókendur av andliti fyri kirkjunum av Judæu, sum vóru í Christi:
23 Men tey høvdu hoyrt einans, At hann, sum søkti at okkum í farnum tíðum, nú prædikar trúnna, sum ēinaferð hann oyddi.
24 Og tey dýrðmettu Guð í mær.

KAPITUL 2

SO, fjúrtan ár eftir, fór eg niðan aftur til Jerusalem við Barnabasi, og tók Titus við *mær* eisini.
2 Og eg fór niðan av opinbering, og framlegði teimum gleðiboðskapin sum eg prædiki Heidninganna millum, men ēinsærisligani fyri teimum sum vóru av umdømi, at ikki við^ nøkrum brøgdum eg skuldi renna, ella hevði runnið, til fánýtis.
3 Men ikki heldur Titus, sum var við mær, verandi Grikki, varð noyddur til at verða umskorin:
4 Og tað uppá grund av følskum brøðrum, óvarugt førdir inn, sum loyniligani komu inn at njósnast *um* okkara frælsi sum vit hava í Christi Jesusi, at teir máttu fört okkum inn í trældóm:
5 Fyri hvørjum[P] vit góvu pláss við undirgivni, nei, ikki í eina stund; *fyri* at sannleiki gleðiboðskaparins mátti halda áfram hjá tykkum.
6 Men av hesum sum tóktust at vera eitthvørt, (hvat*iðso* teir vóru, tað ger mær ikki mun: Guð góðtekur ongan mans persón:) tí at teir, sum tóktust *at vera eitthvørt* í ráðførslu, løgdu einkið afturat mær:
7 Men tvørturímóti, tá ið teir sóu, at gleðiboðskapur óumskeringarinnar var mær litin til, eins og *gleðiboðskapur* umskeringarinnar *var* Pæturi;
8 (Tí at hann, sum ávirkanarligani virkaði í Pæturi til ápostlatænastu umskeringarinnar, hin sami var mektigur í mær mótvegis Heidningunum:)
9 Og tá ið Jákob, Cē´-phăs, og Jóhannes, hvørjir tóktust at vera stólpar, varnaðust ta náði sum mær var givin, góvu teir til mín og Barnabasar høgru hendur samfelags; at vit *skuldu fara* til hinar heidnu, og teir til umskeringina.
10 Einans *at teir vildu,* at vit skuldu minnast tey fátæku; tað sama sum eg eisini var fúsur at gera.
11 Men tá ið Pætur var komin til Ăn-tī-ŏ´-chī-ŭ, mótstóð eg honum upp í andlitið, av tí at hann var at verða lastaður.
12 Tí at áðrenn tað komu ávísir frá Jákobi, át hann við Heidningunum: men tá ið teir vóru komnir, hevði *hann seg* undan og skildi seg frá *teimum,* óttandi teir sum vóru av umskeringini.
13 Og hīnir Jødarnir kávalótust líkaleiðis við honum; so mikið, at Barnabas eisini varð drigin avstað við teirra kávalótum.
14 Men tá eg sá, at teir gingu ikki reiðiligani samsvarandi við sannleika gleðiboðskaparins, segði eg við Pætur frammi fyri *teim* øllum, Um tú, verandi Jødi, livirt eftir háttarlagi Heidninga, og ikki sum Jødarnir gera, hví noyðirt tú Heidningarnar at liva sum Jødarnir gera?
15 Vit, *sum* av náttúru *eru*

Jødar, og ikki syndarar av Heidningunum,
16 Vitandi, at maður verður ikki rættvísgjørdur við verkum lógarinnar, men við trúgv Jesu Christs, hava enntá vit trúð á Jesus Christ, at vit máttu verða rættvísgjørdir við trúgv Christs, og ikki við verkum lógarinnar: tí at við verkum lógarinnar skal einkið kjøt verða rættvísgjørt.
17 Men um, meðan vit søkja at verða rættvísgjørdir við Christi, vit sjálvir eisini verða funnir syndarar, *er* tessvegna Christus tænarin hjá synd? Guð sýti *fyri*.
18 Tí at um eg byggi aftur tey tingini sum eg oyddi, *so* geri eg meg sjálvan *til* ein misbrótara.
19 Tí at eg, gjøgnum lógina, eri deyður fyri lógini, at eg mátti liva yvirfyri Guði.
20 Eg eri krossfestur við Christi: hóast hetta, eg livi; tó ikki eg, men Christus livir í mær: og tað lív, sum eg nú livi í kjøtinum, *tað* livi eg við trúgv Sonar Guðs, sum elskaði meg, og gav seg sjálvan fyri meg.
21 Eg ógildi ikki náði Guðs: tí at um rættvísi *komi* við lógini, tá er Christus deyður til einkiðs.

KAPITUL 3

O DÁRSOMU Galatarar, hvør hevur trøllbundið tykkum, at tit skuldu ikki lýða sannleikan, frammi fyri hvørs eygum Jesus Christus hevur verðið eyðsýniliga settur fram, krossfestur tykkara millum?
2 Hetta einans vildi eg lært av tykkum, Móttóku tit Andan við gerningum lógarinnar, ella við hoyring trúarinnar?
3 Eru tit so dársamir? havandi byrjað í Andanum, eru tit nú gjørdir fullkomnir av kjøtinum?
4 Hava tit tolt so mong ting til einkiðs? um *tað* enn *veri seg* til einkiðs.
5 Hann, tessvegna, sum tænir til tykkum Andan, og virkar kraftargerðir tykkara millum, *ger hann tað* við gerningum lógarinnar, ella við hoyring trúarinnar?
6 Enntá sum Ábraham trúði Guði, og tað varð roknað til hansara til rættvísi.
7 Viti tit tessvegna, at teir, sum eru av trúgv, hinir somu eru børn Ábrahams.
8 Og skriftin, fyrifram síggjandi, at Guð vildi rættvísgera hinar heidnu gjøgnum trúgv, prædikaði frammanundan Ábrahami gleðiboðskapin, *sigandi,* Í tær skulu allar tjóðir verða vælsignaðar.
9 So at teir, sum veri av trúgv, eru vælsignaðir við hinum trúfasta Ábrahami.
10 Tí at so mangir, sum eru av gerningum lógarinnar, eru undir banningini: tí at skrivað stendur, Bannaður *er* hvør tann, sum heldur ikki fram í øllum tingum sum eru skrivaði í bók lógarinnar, at gera tey.
11 Men at eingin maður verður rættvísgjørdur við lógini í eygsjón Guðs, *tað er* eyðsýnt: tí at, Hin rættvísi skal liva við trúgv.
12 Og lógin er ikki av trúgv: men, Tann maður, sum ger tey, skal liva í teimum.
13 Christus hevur endurloyst okkum frá banning lógarinnar, verðandi gjørdur ein banning fyri okkum: tí at skrivað stendur, Bannaður *er* hvør tann, sum á træi hongur:
14 *Fyri* at signing Ábrahams mátti koma á Heidningarnar gjøgnum Jesus Christ; at vit máttu móttaka fyrijáttan Andans gjøgnum trúgv.
15 Brøður, eg tali eftir háttarlagi manna; Tó *at tað veri* bert sáttmáli mans, tó, *um hann verði* staðfestur, *so* ógildir eingin maður, ella leggur afturat hartil.
16 Nú, til Ábrahams og sáðs

hansara vórðu fyrijáttanirnar gjørdar. Hann sigur ikki, Og til sáða, sum um mangar; men sum um ēin, Og til sáðs tíns, sum er Christus.

17 Og hetta sigi eg, *at* sáttmálan, sum varð staðfestur frammanundan av Guði í Christi, kann lógin, sum varð fýra hundrað og tríati ár aftaná, ikki ógilda, at hon skuldi gjørt fyrijáttanina av ongari virkni.

18 Tí at um arvurin *veri seg* av lógini, *tá er hann* ei meira av fyrijáttan: men Guð gav *hann* til Ábrahams við^ fyrijáttan.

19 Hvørsvegna *tænir* tá lógin? Hon varð løgd afturat uppá grund av misgerðum, til sáðið skuldi koma, til hvørs fyrijáttanin varð gjørd; *og hon varð* fyriskipað av einglum í millumgongumans hond.

20 Nú, millumgongumaður er ikki *millumgongumaður* hjá ēinum, men Guð er ēin.

21 *Er* lógin tá ímóti Guðs fyrijáttanum? Guð sýti *fyri:* tí at um tað hevði verið ein lóg givin, sum kundi havt givið lív, sanniliga skuldi rættvísi havt verið við^ lógini.

22 Men skriftin hevur innilokað alt undir synd, at fyrijáttanin við^ trúgv hjá Jesusi Christi mátti verða givin til teirra sum trúgva.

23 Men áðrenn trúgv kom, vórðu vit hildnir í varðhaldi undir lógini, byrgdir inni *fram*at trúnni sum skuldi síðani verða opinberað.

24 Hvørsvegna lógin var okkara skúlameistari *til at føra okkum* til Christs, at vit máttu verða rættvísgjørdir við^ trúgv.

25 Men eftir at trúgv er komin, eru vit ikki longur undir einum skúlameistara.

26 Tí at tit eru øll børn Guðs við^ trúgv á Christ Jesus.

27 Tí at so mangir av tykkum, sum eru vorðnir doyptir inn í Christ, hava latist í Christ.

28 Har er hvørki Jødi ella Grikki, har er hvørki trælur ella frælsur, har er hvørki kallur ella kallinna: tí at tit eru allir ēitt í Christi Jesusi.

29 Og um tit *veri* Christs, tá eru tit sáð Ábrahams, og arvingar samsvarandi við fyrijáttanina.

KAPITUL 4

NÚ, eg sigi, *At* arvingin, so leingi sum hann er barn, bregður einkið frá einum tænara, hóast hann veri harri yvir øllum;

2 Men er undir verjum og stjórnarum inntil tíðina, ásett av faðirinum.

3 Enntá soleiðis vit, tá ið vit vóru børn, vóru í trældómi undir grundreglum heimsins:

4 Men tá ið fylling tíðarinnar var komin, sendi Guð fram Son sín, gjørdan av kvinnu, gjørdan undir lógini,

5 At endurloysa teir sum vóru undir lógini, at vit máttu móttaka sona-ættleiðingina.

6 Og av tí at tit eru synir, hevur Guð sent fram Anda Sonar síns inn í hjørtu tykkara, rópandi, Abba, Faðir.

7 Hvørsvegna tú ert ikki meira tænari, men sonur; og um sonur, tá arvingi Guðs gjøgnum Christ.

8 Hvussu veri tað *seg* tá, tá ið tit kendu ikki Guð, gjørdu tit teimum tænastu, sum av náttúru eru eingir gudar.

9 Men nú, eftir at tit hava kent Guð, ella heldur, eru kendir av Guði, hvussu venda tit aftur til hinar veiku og visasligu grundreglurnar, yvirfyri hvørjum tit tráa aftur at vera í trældómi?

10 Tit geva ans eftir døgum, og mánaðum, og tíðum, og árum.

11 Eg eri ræddur um tykkum, bara ikki eg havi latið út uppá tykkum arbeiði til einkiðs.

12 Brøður, eg trábiði tykkum, verið sum eg *eri;* tí at eg *eri* sum

tit *eru:* tit hava ikki skatt meg yvirhøvur.

13 Tit vita, hvussu gjøgnum veikleika av kjøtinum eg prædikaði tykkum gleðiboðskapin í fyrstani.

14 Og mína freisting, sum var í kjøti mínum, vanvirdu tit ikki, ella havnaðu; men tóku ímóti mær sum einum eingli Guðs, *enntá* sum Christi Jesusi.

15 Hvar er tá signaðssemin tit talaðu um? tí at eg beri tykkum vitnisburð, at um *tað hevði verið* gjørligt, vildu tit havt slitið út tykkar egnu eygu, og havt givið tey til mín.

16 Eri eg tí vorðin tykkara fíggindi, av tí at eg sigi tykkum sannleikan?

17 Teir vandlætisligani ynda tykkum, *men* ikki væl; ja, teir vildu útilokað tykkum, at tit máttu yndað teir.

18 Men *tað er* gott at vera vandlætisligani yndaður altíð í *einum* góðum *tingi*, og ikki einans tá ið eg eri hjástaddur hjá tykkum.

19 Míni lítlu børn, av hvørjum eg aftur *havi* føðingarverkir, inntil Christus verði myndaður í tykkum,

20 Eg trái at vera hjástaddur hjá tykkum nú, og at broyta rødd mína; tí at eg standi í iva um tykkum.

21 Sigið mær, tit sum tráa at vera undir lógini, hoyra tit ikki lógina?

22 Tí at skrivað stendur, at Ábraham hevði tveir synir, tann ēina viðˆ eini trælmoyggj, hīn viðˆ eini fríkvinnu.

23 Men hann, *sum var* av trælkvinnuni, varð føddur eftir kjøtinum; men hann av fríkvinnuni, *varð* viðˆ fyrijáttan.

24 Hvørji ting eru ein myndlíking: tí at hesir eru teir tveir sáttmálarnir; tann ēini frá Sĭ-nāi fjallinum, sum gitur til trældóms, sum er Ágar.

25 Tí at henda Ágar er Sĭ-nāi fjall í Arabiu, og svarar til Jerusalem sum nú er, og er í trældómi við børnum sínum.

26 Men Jerusalem, sum er fyri oman, er fræls, sum er móðir okkar alra.

27 Tí at skrivað stendur, Fegnast, *tú* ófrukt, sum ei føðirt; brót fram og rópa, tú sum ei hevurt verkir: tí hin ēinliga hevur mong fleiri børn enn hon sum hevur mann.

28 Nú, vit, brøður, eins og Ísaak*ur* var, eru fyrijáttanar-børnini.

29 Men eins og tá, hann sum varð føddur eftir kjøtinum, søkti at honum *sum varð føddur* eftir Andanum, enntá soleiðis *er tað* nú.

30 Hóast hetta, hvat sigur skriftin? Kasta út trælkvinnuna og son hennara: tí at sonurin hjá trælkvinnuni skal ei vera arvingi við syninum hjá fríkvinnuni.

31 So at, brøður, vit eru ikki børn at trælkvinnuni, men at hini fríu.

KAPITUL 5

STANDIÐ fastir, tessvegna, í frælsinum, hvarvið Christus hevur gjørt okkum fríar, og verðið ikki innvavdir aftur við trældóms-okinum.

2 Sí eg, Paulus, sigi tykkum, at um tit verði umskornir, skal Christus einkið gagna tykkum.

3 Tí at eg vitni aftur fyri hvørjum manni sum er umskorin, at hann er skuldnari til at gera alla lógina.

4 Christus er vorðin tykkum av ongari virkni, hvørjirsumhelst av tykkum *ið* eru rættvísgjørdir viðˆ lógini; tit eru falnir frá náði.

5 Tí at vit, gjøgnum Andan, bíða eftir vónini um rættvísi viðˆ trúgv.

6 Tí at í Jesusi Christi gagnar hvørki umskering nakað, ella óumskering; men trúgv, sum virkar viðˆ kærleika.

7 Tit runnu væl; hvør forðaði tykkum, at tit skuldu ikki lýða sannleikan?
8 Henda yvirtala *kemur* ikki av honum sum kallar tykkum.
9 Eitt sindur *av* súrdeiggi súrgar allan klumpin.
10 Eg havi treyst á tykkum gjøgnum Harran, at tit vilja vera ongan øðrvísi hátt sinnaðir: men hann, sum órógvar tykkum, skal bera dóm sín, hvørsumhelst hann veri *seg*.
11 Og eg, brøður, um eg enn prædiki umskering, hví líði eg enn atsókn? tá er meinbogi krossins lættur av.
12 Eg vildi, *at* teir vórðu enntá skornir av, sum órógva tykkum.
13 Tí at, brøður, tit eru vorðnir kallaðir til frælsis; einans *brúkið* ikki frælsi til høvi fyri kjøtið, men við^ kærleika tænið hvør øðrum.
14 Tí at øll lógin er uppfylt í ēinum orði, *enntá* hesum; Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg.
15 Men um tit bíti og uppeti hvør annan, gevið gætur at tit verði ikki upptærdir hvør av øðrum.
16 *Hetta* sigi eg tá, Gangið í Andanum, og tit skulu ikki fullføra girnd kjøtsins.
17 Tí at kjøtið girnast ímóti Andanum, og Andin ímóti kjøtinum: og hesi eru andstødd hvørt fyri hīnum: so at tit kunnu ikki gera tey tingini sum tit vildu.
18 Men um tit verði leiddir av Andanum, eru tit ikki undir lógini.
19 Nú, kjøtsins verk eru eyðsýnd, hvørji eru *hesi;* Hordómur, siðloysi, óreinska, skendska,
20 Avgudadýrkan, heksakunstur, hatur, sundurlyndi, kappstríð, vreiði, klandur, tvídráttir, ranglærur,
21 Øvundanir, myrðir, fyllskapur, ólátaskapir, og tílíkt: um hvørt eg sigi tykkum framman undan, eins og eg eisini havi sagt *tykkum* í farnari tíð, at teir, sum gera slíkar lutir, skulu ikki arva kongadømi Guðs.
22 Men ávøkstur Andans er kærleiki, gleði, friður, langmóð, mildsemi, góðsemi, trúgv,
23 Eyðmjúkleiki, fráhaldsemi: ímóti slíkum er eingin lóg.
24 Og teir, sum eru Christs, hava krossfest kjøtið við lystunum og girndunum.
25 Um vit livi í Andanum, latum oss eisini ganga í Andanum.
26 Latum oss ei vera tráiligar eftir fáfongdari æru, ertandi hvør annan, øvundandi hvør annan.

KAPITUL 6

BRØÐUR, um ein maður verði yvirtikin í einum feili, tit, sum eru andligir, upprættið ein slíkan í anda eyðmjúkleikans; havandi teg sjálvan í huga, at ikki tú eisini verði freistaður.
2 Berið tit byrðar hvørs annars, og soleiðis uppfyllið lóg Christs.
3 Tí at um ein maður haldi seg sjálvan at vera eitthvørt, tá ið hann einkið er, hann villleiðir seg sjálvan.
4 Men lat hvønn mann royna sítt egna verk, og tá skal hann hava fagnað í sær sjálvum aleina, og ikki í einum øðrum.
5 Tí at hvør maður skal bera sína egnu byrði.
6 Lat hann, sum verður lærdur í orðinum, útdeila honum, sum frálærir, í øllum góðum lutum.
7 Verðið ikki villleiddir; Guð verður ikki spottaður: tí at hvatsumhelst *ið* ein maður sáar, tað skal hann eisini heysta.
8 Tí at hann, sum sáar til kjøt sítt, skal av kjøtinum heysta spilling; men hann, sum sáar til Andan, skal av Andanum heysta ævigtvarandi lív.
9 Og latum oss ei troyttast í vælgering: tí at á rættari tíð skulu vit heysta, um vit maktist ei.
10 Sum vit tí hava høvi, latum

okkum gera øllum *monnum* gott, serstakliga teimum sum eru av húshaldi trúarinnar.

11 Tit síggja, hvussu stórt bræv eg havi skrivað til tykkara við míni egnu hond.

12 So mangir sum tráa at halda eina fagra sýning í kjøtinum, teir noyða tykkum at verða umskornar; einans at ikki teir skuldu liðið atsókn fyri kross Christs.

13 Tí at eiheldur teir sjálvir, sum eru umskornir, halda lógina; men tráa at fáa tykkum umskornar, at teir mega rósa *sær* í kjøti tykkara.

14 Men Guð sýti *fyri,* at eg skuldi rósað *mær,* uttan í krossi várs Harra Jesu Christs, við hvørjumᵖ heimurin er krossfestur mær, og eg heiminum.

15 Tí at í Christi Jesusi gagnar hvørki umskering nakað, ella óumskering, men ein nýggjur skapningur.

16 Og so mongum sum ganga samsvarandi við hesa reglu, friður *veri* á teimum, og miskunn, og uppiá Ísrael Guðs.

17 Hiðanífrá lat ongan mann órógva meg: tí at eg beri í mínum likami merkini Harrans Jesu.

18 Brøður, náði várs Harra Jesu Christs *veri* við anda tykkara. Á-měn.

¶ Til Galataranna, skrivaður frá Róm.

EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS TIL EPHESARANNA.

KAPITUL 1

PAULUS, ein ápostul Jesu Christs við vilja Guðs, til hinna heilagu sum eru í Ē-phē-sūs, og til hinna trúføstu í Christi Jesusi:

2 Náði *veri* til tykkara, og friður, frá Guði Faðir várum, og *frá* Harranum Jesusi Christi.

3 Signaður *veri* Guð og Faðir várs Harra Jesu Christs, sum hevur signað okkum við øllum andligum signingum í himinskum *plássum* í Christi:

4 Samsvarandi við sum hann hevur útvalt okkum í honum áðrenn grundlegging veraldarinnar, at vit skuldu vera heilagir og uttan atfinning frammi fyri honum í kærleika:

5 Havandi fyritilætlað okkum til barna-ættleiðingina við Jesusi Christi til sín sjálvs, samsvarandi við góða tokka vilja síns,

6 Dýrdini av síni náði til prís, í hvørji hann hevur gjørt okkum góðtiknar í hinum elskaða.

7 Í hvørjumᵖ vit hava endurloysing gjøgnum blóð hansara, fyrigeving syndanna, samsvarandi við ríkdómarnar av náði hansara;

8 Í hvørji hann hevur verið ríkiligur mótvegis okkum í øllum vísdómi og skynsemi;

9 Havandi gjørt okkum kunnan loyndardóm vilja síns, samsvarandi við sín góðtokka, sum hann hevur avrátt í sær sjálvum:

10 At í trúar-húshaldinum av fylling tíðanna, hann mátti savna saman í ēitt øll ting í Christi, bæði sum eru í himni, og sum eru á jørð; *enntá* í honum:

11 Í hvørjumᵖ eisini okkum hevur lutast arvur, verandi fyritilætlaðir samsvarandi við ætlan hansara sum virkar øll ting eftir ráðagerð egna vilja síns:

12 At vit skuldu vera dýrd hansara til prís, sum fyrst litu á Christ.

13 Á hvønn tit eisini *litu,* eftir at tit hoyrdu sannleiks-orðið, gleðiboðskap frelsu tykkara: í hvørjum[P] eisini, eftir at tit trúðu, tit vórðu innsiglaðir við hinum heilaga Anda av fyrijáttan,

14 Sum er pantur arvs okkara, inntil endurloysingina av keyptu ognini, dýrd hansara til prís.

15 Hvørsvegna eg eisini, eftir *at* eg hoyrdi um tykkara trúgv á Harran Jesus, og kærleika til alra teirra heilagu,

16 Gevist ikki at veita tøkkir fyri tykkum, nevnandi tykkum í bønum mínum;

17 At Guð várs Harra Jesu Christs, Faðir dýrdarinnar, má geva tykkum anda vísdóms og opinberingar í kunnleikanum til hansara:

18 Eygu vits tykkara verðandi upplýsnað; at tit mega vita, hvat er vónin av kallan hansara, og hvat ríkdómarnir av dýrdini av arvi hansara í teimum heilagu,

19 Og hvør *er* avbæri mikilleikin av kraft hansara mótvegis okkum sum trúgva, samsvarandi við virkanina av mektigu kraft hansara,

20 Hvørja hann virkaði í Christi, tá ið hann reisti hann frá teimum deyðu, og setti *hann* við sína egnu høgru hond í teimum himinsku *plássunum,*

21 Langt omanfyri alt fúrstadømi, og vald, og mátt, og harradømi, og hvørt navn sum verður nevnt, ikki einans í hesi verøld, men eisini í teirri sum koma skal:

22 Og hevur lagt øll *ting* undir føtur hansara, og gav hann *til at vera* høvdið yvir øllum *tingum* til kirkjuna,

23 Sum er likam hansara, fyllingin av honum sum fyllir alt í øllum.

KAPITUL 2

OG tykkum *hevur hann livandigjørt,* sum vóru deyðir í misgerðum og syndum;

2 Hvarí, í farnari tíð, tit gingu sambært tíðarhátti hesa heims, sambært prinsinum av kraft luftarinnar, tí anda sum nú virkar í børnum ólýdnisins:

3 Hvørja millum eisini vit allir høvdu okkara levnað í farnum tíðum í girndum kjøts okkara, uppfyllandi tráanir kjøtsins og hugans; og vóru av náttúru børn vreiðinnar, enntá sum aðrir.

4 Men Guð, sum er ríkur í miskunn, fyri sín mikla kærleika, við hvørjum hann elskaði okkum,

5 Sjálvt tá ið vit vóru deyðir í syndum, hevur livandigjørt okkum saman við Christi, (av náði eru tit frelstir;)

6 Og hevur reist *okkum* upp saman, og fingið *okkum at* sita saman í himinskum *plássum* í Christi Jesusi:

7 At í øldunum, *ið* koma skulu, hann mátti sýna hinar ovurhonds ríkdómarnar av síni náði í *sini* góðsku mótvegis okkum, gjøgnum Christ Jesus.

8 Tí av náði eru tit frelstir, gjøgnum trúgv; og tað ikki av tykkum sjálvum: *tað er* gáva Guðs:

9 Ikki av verkum, at ikki nakar maður skuldi rósað *sær.*

10 Tí at vit eru handverk hansara, skapaðir í Christi Jesusi til góð verk, sum Guð hevur frammanundan fyriskipað, at vit skuldu ganga í teimum.

11 Hvørsvegna minnist til, at tit, *verandi* í farnari tíð Heidningar í kjøtinum, sum verða kallaðir Óumskering av tí sum verður kallað Umskering í kjøtinum, gjørd við hondum;

12 At á teirri tíð vóru tit uttan Christ, verandi ókunnumenn frá borgaraskapi Ísraels, og fremmandir frá fyrijáttanar-sáttmálunum, havandi onga vón, og uttan Guð í heiminum:

13 Men nú, í Christi Jesusi, eru tit, sum ëinaferð vóru langt

burturifrá, gjørdir nær viðˆ blóði Christs.

14 Tí at hann er friður okkara, sumᵖ hevur gjørt báðar *til* ēitt, og hevur brotið niður skilnaðarmillumgarðin *imillum okkum;*

15 Havandi avtikið í sínum kjøti figgindskapin, *enntá* lógina av boðum — *innihildin* í fyriskipanum; fyri at gera í sær sjálvum úr tvinnum ēin nýggjan mann, *soleiðis* fáandi í lag frið;

16 Og at hann mátti endursóna báðar til Guðs í ēinum likami viðˆ krossinum, havandi dripið fíggindskapin harviðˆ:

17 Og kom og prædikaði frið fyri tykkum sum vóru langt burturifrá, og fyri teimum sum vóru nær.

18 Tí at gjøgnum hann, vit, báðir *partar,* hava atgongd við ēinum Anda til Faðirin.

19 Nú, tessvegna eru tit ei meira fremmandir og útlendingar, men samborgarar við teimum heilagu, og av húshaldi Guðs;

20 Og verða bygdir uppá grundvøll ápostlanna og prophetanna, Jesus Christus sjálvur verandi høvuðs horn*steinur*in;

21 Í hvørjumᵖ allur bygningurin, hóskiliga skipaður saman, veksur at heilagum templi í Harranum:

22 Í hvørjumᵖ tit eisini verða bygdir saman til ein bústað Guðs gjøgnum Andan.

KAPITUL 3

FYRI hesa grund eg, Paulus, fangi Jesu Christs fyri tykkum Heidningar,

2 Um tit havi hoyrt um trúarhúshald náðar Guðs, sum er givið mær mótvegis tykkum:

3 Hvussu ið viðˆ opinbering hann gjørdi mær kunnugt loyndarmálið; (sum eg skrivaði áður í fáum orðum,

4 Hvarviðˆ, tá ið tit lesa, tit mega skilja kunnleika mín í loyndardómi Christs)

5 Sum í øðrum øldum varð ikki gjørdur kunnur mannasonunum, sum hann er nú opinberaður hans heilagu ápostlum og prophetum av Andanum;

6 At Heidningarnir skuldu vera samarvingar, og av hinum sama likami, og luttakarar í hansara fyrijáttan í Christi viðˆ gleðiboðskapinum:

7 Hvarhjá eg varð gjørdur tænari, samsvarandi við gávuna av náði Guðs, givin mær viðˆ virknaðarfullu virkanini av kraft hansara.

8 Mær, sum eri minni enn hin minsti av øllum heilagum, er henda náði givin, at eg skuldi prædika millum Heidninganna hinar órannsakiligu ríkdómar Christs;

9 Og at fáa allar *menn at* sjá, hvat *er* samfelag loyndardómsins, sum frá byrjan veraldarinnar hevur verið fjaldur í Guði, sum skapti øll ting viðˆ Jesusi Christi:

10 Til ta ætlan, at nú, yvirfyri fúrstadømunum og máttunum í himinskum *plássum,* mátti verða kunnur viðˆ kirkjuni hin margfaldi vísdómur Guðs,

11 Samsvarandi við hina ævigu fyriætlan sum hann fyriætlaði í Christi Jesusi Harra várum:

12 Í hvørjum vit hava dirvi og atgongd við treysti av trúgv hansara.

13 Hvørsvegna eg trái, at tit falli ikki í fátt yvir mínar trongslur fyri tykkum, sum er dýrd tykkara.

14 Fyri hesa grund eg boyggi knæ míni at Faðir várs Harra Jesu Christs,

15 Av hvørjum heila familjan í himni og á jørð verður nevnd,

16 At hann vildi veita tykkum, samsvarandi við ríkdómarnar av síni dýrd, at verða styrktar við mátti av sínum Anda í hinum innara manni;

17 At Christus má dvøljast í hjørtum tykkara viðˆ trúgv; at tit,

verandi rótfestir og grundfestir í kærleika,
18 Mega vera førir fyri at fata við øllum heilagum, hvat *er* breiddin, og longdin, og dýpdin, og hæddin;
19 Og at kenna kærleika Christs, sum fer framvið kunnleika, at tit máttu verða fyltir við allari fylling Guðs.
20 Nú, honum sum er mentur at gera avbera ríkiliga uppum alt sum vit biðja um ella hugsa, samsvarandi við kraftina sum virkar í okkum,
21 Honum *veri* dýrd í kirkjuni við^ Christi Jesusi, út gjøgnum allar øldir, verøld uttan enda. Á-měn.

KAPITUL 4

EG tessvegna, fangi Harrans, bøni tykkum, at tit gangi verdigir av teirri innkalling, við hvørji tit eru kallaðir,
2 Við øllum lítillæti og eyðmjúkleika, við langmóði, berandi yvir við hvør øðrum í kærleika;
3 Strembandi *eftir* at varðveita ēinleika Andans í bandi friðarins.
4 *Tað er* ēitt likam, og ēin Andi, enntá sum tit eru kallaðir í ēinari vón av kallan tykkara;
5 Ēin Harri, ēin trúgv, ēin dópur,
6 Ēin Guð og Faðir alra, sum *er* omanfyri allar, og gjøgnum allar, og í tykkum øllum.
7 Men hvørjum *og* ēinum av okkum er givin náði samsvarandi við málið av gávu Christs.
8 Hvørsvegna hann sigur, Tá ið hann steig upp til hæddar, leiddi hann fangaskap *til* fanga, og gav monnum gávur.
9 (Nú, at hann steig upp, hvat er tað uttan at hann eisini steig niður fyrst, inn í lægru partar jarðarinnar?
10 Hann sum steig niður, er hin sami eisini sum steig upp, langt uppum allar himnar, at hann mátti fylla allar lutir.)
11 Og hann gav summar, ápostlar; og summar, prophetar; og summar, evangelistar; og summar, hirðar og frálærarar;
12 Fyri fullkomning hinna heilagu, fyri verk tænastunnar, fyri uppbygging likams Christs:
13 Til vit allir koma í ēinleika trúarinnar, og kunnleika Sonar Guðs, at fullkomnum manni, at vakstrarmálinum av fylling Christs:
14 At vit *hiðanífrá* veri ei meira børn, syftir higar og hagar, og bornir umkring við hvørjum Guðslæru vindi, við^ falslótum manna, *og* snúðigum snildleika, hvarvið^ teir liggja uppá lúr *fyri* at villa;
15 Men, talandi sannleikan í kærleika, mega vaksa upp inn í hann í øllum lutum, sum er høvdið, *enntá* Christus:
16 Frá hvørjum alt likamið, tætt samanfelt og samanknýtt við tí sum hvør liður veitir, samsvarandi við virknaðarfullu virkanina í mátinum hjá hvørjum parti, ger øking av likaminum til uppbyggingina av sær sjálvum í kærleika.
17 Hetta sigi eg tí, og vitni í Harranum, at tit hiðanífrá gangi ikki sum aðrir Heidningar ganga, í fáfongd huga teirra,
18 Havandi vitið myrkjað, verandi firraðir frá lívi Guðs gjøgnum fákunnuna sum er í teimum, vegna blindleika hjarta teirra:
19 Hvørjir, verandi framvið kenslu, hava givið seg sjálvar yvir til skendsku, til at virka alla óreinsku við grádugleika.
20 Men tit hava ikki soleiðis lært Christ;
21 Um so veri, at tit havi hoyrt hann, og eru vorðnir lærdir av honum, sum sannleikin er í Jesusi:
22 At tit latast úr viðvíkjandi hinum fyrra levnaði hin gamla mann, sum er spiltur samsvarandi við hinar tølandi lystir;
23 Og verða endurnýggjaðir í anda huga tykkara;
24 Og at tit latast í hin nýggja

mann, sum eftir Guði er skaptur í rættvísi og sonnum heilagleika.

25 Hvørsvegna, leggjandi av *at* lúgva, tali hvør maður sannleika við næsta sín: tí at vit eru limir hvør hjá øðrum.

26 Verðið tit firtnir, og syndið ikki: latið ikki sólina fara niður yvir vreiði tykkara:

27 Eiheldur gevið pláss fyri djevlinum.

28 Lat hann, sum stjól, stjala ei meira: men heldur lat hann streva, virkandi við *sínum* hondum tað ting sum er gott, at hann má hava at geva til hansara sum tørvar.

29 Latið einkið spilt samskifti útganga út úr munni tykkara, men tað sum er gott til nýtslu uppbyggingar, at tað má tæna náði at hoyrarunum.

30 Og gerið ikki Guðs heilaga Anda sorg, hvarvið^ tit eru innsiglaðir til endurloysingardagin.

31 Latið allan beiskleika, og vreiði, og firtni, og ólátaskap, og illa talu, verða koyrd burtur frá tykkum, *saman* við øllum illvilja:

32 Og verið tit blíðir hvør móti øðrum, eymhjartaðir, fyrigevandi hvør øðrum, enntá sum Guð fyri Christī skyld hevur fyrigivið tykkum.

KAPITUL 5

VERIÐ tit tessvegna eftirfylgjarar Guðs, sum kær børn;

2 Og gangið í kærleika, eins og Christus eisini hevur elskað okkum, og hevur givið seg sjálvan fyri okkum — ein offur*gáva* og eitt sláturoffur til Guðs, til ein søttangandi royk.

3 Men siðloysi, og øll óreinska, ella ágirnd, latið tað ikki eingong verða nevnt tykkara millum, sum sømir heilagum;

4 Eiheldur skitinleiki, ella býttislig tala, ella *leyslátað* skemting, sum eru ikki sømilig: men heldur veiting av tøkkum.

5 Tí at hetta vita tit, at eingin horkallur, ella óreinur persónur, ella havisjúkur maður, sum er ein avgudadýrkari, hevur nakran arv í kongadømi Christs og Guðs.

6 Latið ongan mann villleiða tykkum við fáfongdum orðum: tí fyri hesi tingini kemur vreiði Guðs uppá ólýdnis-børnini.

7 Verið ikki tit, tessvegna, luttakarar við teimum.

8 Tí at tit vóru ēinaferð myrkur, men nú *eru tit* ljós í Harranum: gangið sum børn hjá ljósi:

9 (Tí at ávøkstur Andans *er* í allari góðsku og rættvísi og sannleika;)

10 Roynandi hvat er góðtakiligt yvirfyri Harranum.

11 Og havið einkið samfelag við hini ófruktsomu verkini av myrkri, men heldur írættasetið *teir*.

12 Tí at tað er skomm sjálvt at tala um hasi tingini sum verða gjørd av teimum í loyndum.

13 Men øll ting, sum verða írættasett, verða gjørd eyðsýnd av ljósinum: tí at hvatsumhelst *ið* ger eyðsýnt, er ljós.

14 Hvørsvegna hann sigur, Vakna tú sum svevurt, og ris frá teimum deyðu, og Christus skal geva tær ljós.

15 Síggið til tá, at tit gangi umhyggjuligani, ikki sum dárar, men sum vísir,

16 Leyskeypandi tíðina, av tí at dagarnir eru óndir.

17 Hvørsvegna verið tit ikki óvísir, men skiljandi hvat vilji Harrans *er*.

18 Og verðið ikki druknir við víni, í hvørjum er ólátaskapur; men verið fyltir við Andanum;

19 Talandi til tykkar sjálvs við psálmum og lov-psálmum og andligum songum, syngjandi og gerandi melodī í tykkara hjørtum fyri Harranum;

20 Veitandi tøkkir altíð fyri øll

ting til Guðs og Faðirsins í navni várs Harra Jesu Christs;
21 Undirgevandi tykkum sjálvar hvør fyri øðrum í ótta Guðs.
22 Ektakonur, undirgevið tykkum sjálvar yvirfyri tykkara egnu ektamonnum, sum Harranum.
23 Tí at ektamaðurin er høvur ektakonunnar, enntá eins og Christus er høvur kirkjunnar: og hann er frelsari likamsins.
24 Tessvegna, eins og kirkjan er undirgivin yvirfyri Christi, soleiðis *veri* ektakonurnar fyri sínum egnu ektamonnum í øllum lutum.
25 Ektamenn, elskið ektakonur tykkara, enntá sum Christus eisini elskaði kirkjuna, og gav seg sjálvan fyri hana;
26 At hann mátti halga og reinsa hana við tváingini av vatni við orðinum,
27 At hann mátti seta hana fram fyri seg sjálvan — ein dýrdsom kirkja, ei havandi blett, ella rukku, ella nakran slíkan lut; men at hon skuldi vera heilag og uttan lýti.
28 Soleiðis áttu menn at elska sínar ektakonur sum síni egnu likam. Hann, sum elskar ektakonu sína, elskar seg sjálvan.
29 Tí at eingin maður nakrantíð enn hataði sítt egna kjøt; men nørir og fjálgar tað, enntá eins og Harrin kirkjuna:
30 Tí at vit eru limir av likami hansara, av kjøti hansara, og av beinum hansara.
31 Av hesi grund skal maður fara frá faðir sínum og móður, og skal verða sameintur at síni ektakonu, og tey tvey skulu vera eitt kjøt.
32 Hetta er ein mikil loyndardómur: men eg tali viðvíkjandi Christi og kirkjuni.
33 Hóast hetta, lat hvønn *og* ein av tykkum fyri seg soleiðis elska ektakonu sína, enntá sum seg sjálvan; og ektakonan *siggi til,* at hon virði ektamann *sín*.

KAPITUL 6

BØRN, lýðið foreldur tykkara í Harranum: tí at hetta er rætt.
2 Æra faðir tín og móður *tína;* (sum er tað fyrsta boðið við fyrijáttan;)
3 At tær má vita væl við, og tú mást liva leingi á jørðini.
4 Og, tit fedrar, eggið ikki børn tykkara til vreiðis: men alið tey upp í uppfostran og formaning Harrans.
5 Tænarar, verið lýdnir móti teimum sum eru *tykkara* meistarar samsvarandi við kjøtið, við ótta og bivan, í einfaldni hjarta tykkara, sum yvirfyri Christi;
6 Ikki við eygnatænastu, sum manntoknarar; men sum tænarar Christs, gerandi Guðs vilja frá hjartanum;
7 Við góðum vilja gerandi tænastu, sum fyri Harranum, og ikki fyri monnum:
8 Vitandi, at hvatsumhelst gott ting *ið* nakar maður ger, tað sama skal hann fáa frá Harranum, hvørt *hann veri seg* trælur ella frælsur.
9 Og, tit meistarar, gerið teimum hini somu tingini, latandi av hóttan: vitandi, at tykkara Meistari eisini er í himni; eiheldur er metan av persónum hjá honum.
10 At enda, brøður mínir, verið sterkir í Harranum, og í kraftini av hansara mátti.
11 Latið *tykkum* í hin heila herbúnað Guðs, at tit mega vera førir fyri at standa ímóti snildarbrøgdum djevulsins.
12 Tí at vit berjast ikki ímóti kjøti og blóði, men ímóti fúrstadømum, ímóti máttum, ímóti stjórnarunum av myrkri hesar veraldar, ímóti andligari vondsku í høgum *plássum*.
13 Hvørsvegna takið at tykkum hin heila herbúnað Guðs, at tit mega vera førir fyri at standa

ímóti á tí ónda deginum, og, havandi gjørt alt, at standa.
14 Standið tí, havandi tykkara lendar girdar umkring við sannleika, og verandi í bróstbrynju rættvísinnar;
15 Og tykkara føtur skøddar við fyrireikingini av gleðiboðskapi friðarins;
16 Framum alt, takandi trúarskjøldurin, hvarvið tit skulu vera førir fyri at sløkkja allar hinar eldsligu ørvar hins illa.
17 Og takið hjálm frelsunnar, og svørð Andans, sum er Guðs orð:
18 Biðjandi altíð við allari bøn og áheitan í Andanum, og vakandi harat við øllum úthaldni og umbønan fyri øllum heilagum;
19 Og fyri mær, at mæli má verða givið mær, at eg má lata upp munn mín djarvligani, at gera kunnan loyndardóm gleðiboðskaparins,
20 Fyri hvønn eg eri umboðsmaður í bondum: at í honum eg má tala djarvligani, eins og eg átti at tala.
21 Men *fyri* at tit eisini mega vita míni viðurskiftir, *og* hvussu mær veit við, skal Tỹch´-ĭ-cŭs, ein háttelskaður bróðir og trúfastur tænari í Harranum, gera kunn fyri tykkum øll ting:
22 Hvønn eg havi sent til tykkara fyri hetta sama endamál, at tit máttu kenna okkara viðurskiftir, og *at* hann mátti ugga hjørtu tykkara.
23 Friður *veri* til brøðurnar, og kærleiki við trúgv, frá Guði Faðirinum og Harranum Jesusi Christi.
24 Náði *veri* við øllum teimum ið elska Harra váran Jesus Christ í ærligleika. Â´-mĕn.

¶ Skrivaður frá Róm til Ê-phēs´-aranna av Tỹch´-ĭ-cŭs-i.

EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS TIL PHILIPPENSARANNA.

KAPITUL 1

PAULUS og Timotheus, tænarar Jesu Christs, til alra hinna heilagu í Christi Jesusi, sum eru í Philippī, við biskupunum og deknunum:
2 Náði *veri* at tykkum, og friður, frá Guði Faðir várum, og *frá* Harranum Jesusi Christi.
3 Eg takki Guði mínum við hvørja endurminning um tykkum,
4 Altíð í hvørji bøn míni fyri tykkum øllum, gerandi umbøn við gleði,
5 Fyri tykkara samfelag í gleðiboðskapinum, frá fyrsta degi inntil nú;
6 Verandi sannførur um sjálvt hetta tingið, at hann, sum hevur byrjað eitt gott verk í tykkum, vil útføra *tað* inntil dag Jesu Christs:
7 Enntá sum tað er sømiligt hjá mær at hugsa hetta um tykkum allar, tí at eg havi tykkum í hjarta mínum; við tað at bæði í mínum bondum, og í verjingini og staðfestingini av gleðiboðskapinum, tit allir eru luttakarar í míni náði.
8 Tí at Guð er mítt vitni, hvussu stórliga mær leingist eftir tykkum øllum í innangoymslum Jesu Christs.
9 Og hetta biði eg, at tykkara kærleiki má múgvast enn meir og meir í kunnleika og *í* allari døming;

10 At tit mega viðurkenna ting,
sum eru avbær; at tit mega vera
ærligir og uttan meinboga til dag
Christs;
11 Verandi fyltir við ávøkstum
rættvísinnar, sum eru við^ Jesusi
Christi, til dýrdar og prís Guðs.
12 Men eg vildi, *at* tit skuldu
skilja, brøður, at tey tingini, *sum*
hendu mær, hava fallið út til fremj-
ingina av gleðiboðskapinum;
13 So at míni bond í Christi
eru eyðsýnd í øllum slottinum,
og í øllum øðrum *plássum;*
14 Og mangir av bøðrunum í
Harranum, vaksandi treystir av
mínum bondum, eru nógv meira
djarvir at tala orðið uttan ótta.
15 Summir víst prædika Christ
enntá av øvund og stríði; og
summir eisini av góðum vilja:
16 Teir ēinu prædika Christ av
trætnaði, ikki ærligani, hugsandi
at leggja trongslu afturat mínum
bondum:
17 Men hīnir av kærleika, vit-
andi, at eg eri settur til verjingina
av gleðiboðskapinum.
18 Hvat tá? ið hvussu er, hvønn
ein hátt, hvørt á kvamsvís, ella í
sannleika, Christus verður præ-
dikaður; og harí fegnist eg, ja, og
vil fegnast.
19 Tí at eg veit, at hetta skal
koma út til mína frelsu gjøgnum
tykkara bøn, og veitan Anda Jesu
Christs,
20 Samsvarandi við mína inni-
ligu væntan og *mína* vón, at í
ongum skal eg verða til skamm-
ar, men *at* við øllum dirvi,
eins og altíð, *soleiðis* eisini nú,
Christus skal verða gjørdur stór-
ur í mínum likami, hvørt *tað veri*
seg við^ lívi, ella við^ deyða.
21 Tí fyri mær at liva *er* Christ-
us, og at doyggja *er* vinningur.
22 Men um eg livi í kjøtinum,
so er hetta ávøksturin av mínum
strevi: tó hvat eg skal velja, veit
eg ikki.
23 Tí at eg eri í treinging ímilli
tveggja *luta,* havandi trá at fara
burtur, og at vera hjá Christi,
sum er nógv betri:
24 Hóast hetta, at verða *verandi*
í kjøtinum *er* meira neyðturviligt
fyri tykkum.
25 Og, havandi hetta sannføri,
veit eg, at eg skal verða *verandi* og
halda áfram hjá tykkum øllum,
fyri tykkara frama og trúargleði;
26 At tykkara fagnan má verða
meira ríkilig í Jesusi Christi fyri
meg við^ míni komu til tykkara
aftur.
27 Einans latið tykkara atferð
vera sum tað sømir gleðiboð-
skapi Christs: at, hvørt eg komi
og síggi tykkum, ella annars verði
frástaddur, eg má hoyra um
tykkara viðurskiftir, at tit standa
fastir í ēinum anda, við ēinum
huga stríðandi saman fyri trúgv
gleðiboðskaparins;
28 Og í ongum tingi ræðslu-
slignir av tykkara mótstandarum:
sum er fyri teir eitt týðiligt tekin
um undirgang, men fyri tykkum
um frelsu, og tað frá Guði.
29 Tí at tykkum er tað givið
Christī vegna, ikki einans at
trúgva á hann, men eisini at líða
fyri hansara skuld;
30 Havandi hitt sama stríðið
sum tit sóu í mær, og nú hoyra
at er í mær.

KAPITUL 2

UM *tað veri seg,* tessvegna,
nøkur troyst í Christi, um
nøkur kærleiks uggan, um nakað
samfelag Andans, um nakrar *væl-*
*vildar*goymslur og miskunnir,
2 Uppfyllið tit mína gleði, at
tit veri líkasinnaðir, havandi hin
sama kærleika, *verandi* av ēinum
samljóði, av ēinum huga.
3 *Latið* einkið *verða gjørt* gjøgn-
um stríð ella fáfongdar-æru; men
í lítillæti av huga lat hvønn meta
annan betri enn seg sjálvan.

4 Hyggi ikki hvør maður um síni egnu ting, men hvør maður eisini um tingini hjá øðrum.
5 Latið henda huga vera í tykkum, sum eisini var í Christi Jesusi:
6 Hvør, verandi í formi Guðs, helt tað ikki rán at vera javnur við Guð:
7 Men gjørdi seg sjálvan av ongum umdømi, og tók uppá seg formin av einum tænara, og varð gjørdur í líkleika manna:
8 Og, verandi funnin í sniði sum maður, eyðmýkti hann seg sjálvan, og gjørdist lýðin at deyða, enntá deyða krossins.
9 Hvørsvegna Guð eisini hevur háttligani upphevjað hann, og givið honum eitt navn sum er omanfyri hvørt navn:
10 At fyri Jesu navni hvørt knæ skuldi boyggja *seg,* av *tingum* í himni, og *tingum* á jørð, og *tingum* undir jørðini;
11 Og *at* hvør tunga skuldi játta, at Jesus Christus *er* Harri, til dýrdar Guðs Faðirsins.
12 Hvørsvegna, mínir háttelskaðu, eins og tit hava altíð lýtt, ikki sum í míni hjáveru einans, men nú mikið meira í míni fráveru, arbeiðið út tykkar egnu frelsu við ótta og bivan.
13 Tí at tað er Guð sum virkar í tykkum, bæði at vilja og at gera av *sínum* góða tokka.
14 Gerið øll ting uttan knarranir og keglanir:
15 At tit mega vera ólastandi og meinaleysir, synir Guðs, uttan átalu, mitt í eini krókutari og spiltari tjóð, hvørja millum tit skína sum ljós˘ í heiminum;
16 Haldandi frammi orði lívsins; at eg má fegnast á degi Christs, at eg havi ikki runnið til einkiðs, eiheldur arbeitt til einkiðs.
17 Ja, og um eg verði ofraður uppiá sláturofri og tænastu trúar tykkara, eg frøist, og fegnist við tykkum øllum.
18 Fyri somu grund eisini frøast tit, og fegnast við mær.
19 Men eg troysti á Harran Jesus at senda Timotheus skjótliga til tykkara, at eg eisini má vera av góðari uggan, tá ið eg veit tykkara tilstand.
20 Tí eg havi ongan mann líkasinnaðan, sum náttúrliga vil hava umsorgan fyri tykkara tilstandi.
21 Tí at allir søkja sítt egna, ikki tey tingini sum eru Jesu Christs.
22 Men tit kenna prógvið um hann, at eins og ein sonur við faðirinum, hevur hann tænt við mær í gleðiboðskapinum.
23 Hann, tessvegna, vóni eg at senda í núverandi *stund,* so skjótt sum eg skal síggja hvussu tað vil ganga hjá mær.
24 Men eg troysti á Harran, at eg eisini sjálvur skal koma skjótliga.
25 Tó helt eg tað neyðugt at senda til tykkum Ē-pă-phrô-dī´tŭs, mín bróður, og felaga í strevi, og hermannafelaga, men tykkara sendiboð, og hann sum tænti fyri tarvir mínar.
26 Tí at honum longdist eftir tykkum øllum, og var fullur av tyngd, av tí at tit høvdu hoyrt at hann hevði verið sjúkur.
27 Tí at víst var hann sjúkur nær deyða: men Guð hevði miskunn yvir hann; og ikki yvir hann einans, men yvir meg eisini, at ikki eg skuldi hava sorg omaná sorg.
28 Eg sendi hann tí tess meira umhyggjuligani, *fyri* at, tá ið tit síggja hann aftur, tit mega fegnast, og at eg má vera tess minni sorgarfullur.
29 Takið ímóti honum, tessvegna, í Harranum, við allari gleði; og haldið slíkar í umdømi:
30 Av tí at fyri Christi verk var hann nær deyða, ei gevandi gætur um sítt lív, *fyri* at bøta *um* tykkara trot á tænastu mótvegis mær.

KAPITUL 3

AT enda, brøður mínir, fegnist í Harranum. At skriva hini somu tingini til tykkara, fyri mær víst *er* ikki svárligt, men hjá tykkum *er tað* trygt.

2 Verið varnir fyri hundum, verið varnir fyri óndum verkamonnum, verið varnir fyri sundurskeringini.

3 Tí at vit eru umskeringin, sum tilbiðja Guð í andanum, og fegnast í Christi Jesusi, og hava einkið troyst á kjøtið.

4 Tó *at* eg mátti eisini havt troyst á kjøtið. Um nakar annar maður heldur, at hann hevur av hvørjum hann mátti troystað á kjøtið, eg meira:

5 Umskorin áttanda dagin, av slekt Ísraels, *av* ætt Benjamins, ein Hebrēari av Hebrēarunum; hvat lógina varðar, ein Pharisēari;

6 Viðvíkjandi vandlæti, søkjandi at kirkjuni; *hvat* varðar rættvísina sum er í lógini, ólastandi.

7 Men hvørji ting *ið* vóru vinningur fyri mær, tey roknaði eg tap fyri Christ.

8 Ja óivað, og eg rokni øll ting *bert* tap fyri avbærleikan av kunnleikanum til Christs Jesu Harra míns: fyri hvønn eg havi liðið tapið av øllum tingum, og rokni tey *bert* skarn, at eg má vinna Christ,

9 Og verða funnin í honum, ei havandi mína egnu rættvísi, sum er av lógini, men hana sum er gjøgnum trúgv Christs, rættvísina sum er av Guði viðˆ trúgv:

10 At eg má kenna hann, og kraftina av uppreisn hansara, og samfelagið av líðingum hansara, verðandi gjørdur sammyndbærur at deyða hansara;

11 Um við nøkrum midlum eg mátti nátt at uppreisnini av teimum deyðu.

12 Ikki sum um eg hevði longu nátt, eiheldur var longu fullkomin: men eg fylgi eftir, um at eg má handtaka tað fyri hvørt eg eisini eri handtikin av Christi Jesusi.

13 Brøður, eg rokni ikki meg sjálvan at hava handtikið: men *hetta* ēina ting *eg geri,* gloymandi hasi tingini sum eru fyri aftan, og rættandi fram at teimum tingunum sum eru fyri framman,

14 Strembi eg ímóti markinum fyri sigursgripin av hini høgu kallan Guðs í Christi Jesusi.

15 Latum okkum tessvegna, so mangir sum veri fullkomnir, vera soleiðis sinnaðar: og um í nøkrum tingi tit veri øðrvísi sinnaðir, skal Guð opinbera tykkum sjálvt hetta.

16 Hóast hetta, hvartil vit hava longu nátt, latum okkum ganga eftir somu reglu, latum okkum íhuga sama tingið.

17 Brøður, verið eftirfylgjarar saman av mær, og merkið *tykkum* teir sum ganga soleiðis sum tit hava okkum til fyridømis.

18 (Tí at mangir ganga, um hvørjar eg havi sagt tykkum ofta, og nú sigi tykkum enntá grátandi, *at teir eru* figgindarnir av krossi Christs:

19 Hvørs endi *er* oyðing, hvørs Guð *er teirra* búkur, og *hvørs* æra *er* í teirra skomm, sum íhuga jarðiskar lutir.)

20 Tí at okkara borgaraskapur er í himni; hvaðani frá eisini vit vænta eftir Frelsaranum, Harranum Jesusi Christi:

21 Sumᵖ skal umskapa okkara neyðarliga likam, at tað má verða snikkað líkt hansara dýrdarfulla likami, samsvarandi við ta virkan, hvarviðˆ hann er førur fyri enntá at undirleggja øll ting at sær sjálvum.

KAPITUL 4

TESSVEGNA, mínir brøður, kærliga elskaðir og longstir eftir, mín gleði og krúna, soleiðis

standið fastir í Harranum, *mínir* kærliga háttelskaðu.

2 Eg trábiði Ev-ō´-dĭ-ăs, og trábiði Sỹn-tỹ´-chê, at tær veri av sama sinni í Harranum.

3 Og eg bøni teg eisini, sanna okfelaga, hjálp teimum kvinnunum sum arbeiddu við mær í gleðiboðskapinum, við Clementi eisini, og *við* øðrum starvsfeløgum mínum, hvørs nøvn *eru* í lívsins bók.

4 Fegnist í Harranum alvegis: *og* aftur sigi eg, Fegnist.

5 Latið tykkara hóvsemi vera øllum monnum kunnug. Harrin *er* fyri hond.

6 Verið sútfullir fyri ongum tingi; men í hvørjum tingi við bøn og áheitan, *saman* við takkarveitan, latið tykkara umbønir verða gjørdar kunnar Guði.

7 Og Guðs friður, sum fer framum alt skil, skal varðveita tykkara hjørtu og hugar, gjøgnum Christ Jesus.

8 At enda, brøður, hvørjisumhelst ting *ið* eru sonn, hvørjisumhelst ting *ið eru* ærlig, hvørjisumhelst ting *ið eru* rættvís, hvørjisumhelst ting *ið eru* rein, hvørjisumhelst ting *ið eru* elskulig, hvørjisumhelst ting *ið eru* av góðum ummæli, um *tað veri* nøkur dygd, og um *tað veri* nakað prís *vert,* hugsið um hesi ting.

9 Tey tingini sum tit hava bæði lært, og tikið við, og hoyrt, og sæð í mær, gerið: og Guð friðarins skal vera við tykkum.

10 Men eg frøddist í Harranum stórliga, at nú endiliga tykkara umsorgan fyri mær hevur blomstrað aftur; í hvørjum tit eisini vóru vandnir, men tykkum vantaði føri.

11 Ikki *tað* at eg tali í mun til tørv: tí at eg havi lært, í hvørjisumhelst støðu eg eri, *harvið* at vera nøgdur.

12 Eg dugi bæði at vera lækkaður, og eg dugi at floyma yvir: allar staðir og í øllum tingum eri eg undirvístur bæði at vera mettur og at vera svangur, bæði at floyma yvir og at líða trot.

13 Eg megni gera øll ting gjøgnum Christ, sum styrkir meg.

14 Hóast hetta, tit hava gjørt væl, at tit høvdu viðurskiftir við mína trongslu.

15 Nú, tit Philippensarar vita eisini, at í byrjanini av gleðiboðskapinum, tá ið eg fór avstað úr Măc-ĕ-dō´-nĭ-ŭ, hevði eingin kirkja viðurskiftir við meg, hvat viðvíkur geving og móttaking, uttan tit ēinir.

16 Tí at enntá í Thĕss-ă-lō´-nĭ-cŭ sendu tit ēinaferð og aftur til mína neyðsyn.

17 Ikki av tí at eg trái eina gávu: men eg trái ávøkst, sum kann fløða yvir til tykkara rokning.

18 Men eg havi alt, og floymi yvir: *tað* er fult hjá mær, havandi móttikið av Ē-pă-phrō-dī´-tŭs-i tey tingini *sum vórðu send* frá tykkum, ein anga av søtum royki, eitt sláturoffur góðtakiligt, væl toknandi fyri Guði.

19 Men Guð mín skal fáa til vegar allan tykkara tørv samsvarandi við síni ríkidømir í dýrd við Christi Jesusi.

20 Nú, Guði og Faðir várum *veri* dýrd um ævir og ævir. Á´-měn.

21 Heilsið hvørjum heilagum í Christi Jesusi. Brøðurnir, sum eru hjá mær, lata heilsa tykkum.

22 Øll tey heilagu lata heilsa tykkum, serliga tey sum eru av húshaldi Çæsars.

23 Náði várs Harra Jesu Christs *veri* við tykkum øllum. Á´-měn.

¶ Hann varð skrivaður til Philippensaranna frá Róm, av Ē-pă-phrō-dī´-tŭs-i.

EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS
TIL
COLOSSENSARANNA.

KAPITUL 1

PAULUS, ein ápostul Jesu Christs viðˆ vilja Guðs, og Timotheus, bróðir *okkara,*
2 Til hinna heiløgu og trúføstu brøðra í Christi, sum eru í Cô-lôs´-sê: Náði *veri* at tykkum, og friður, frá Guði Faðir várum og Harranum Jesusi Christi.
3 Vit veita tøkkir til Guðs og Faðirs várs Harra Jesu Christs, biðjandi altíð fyri tykkum,
4 Síðan vit hoyrdu um tykkara trúgv á Christ Jesus, og um kærleikan *sum tit hava* til alra hinna heiløgu,
5 Fyri ta vón sum er løgd av til tykkara í himni, um hvørja tit hoyrdu áður í sannleiks-orði gleðiboðskaparins;
6 Sum er komið til tykkara, eins og *tað er* í øllum heiminum; og ber fram ávøkst, sum *tað ger* eisini í tykkum, síðan tann dag tit hoyrdu *um tað,* og kendu náði Guðs í sannleika:
7 Eins og tit eisini lærdu av Ēp´-ă-phrăs-i, okkara kæra samtænara, sum fyri tykkum er ein trúfastur tænari Christs;
8 Sum eisini kunngjørdi okkum tykkara kærleika í Andanum.
9 Fyri hesa grund eisini, síðan tann dag vit hoyrdu *tað,* gevast vit ikki at biðja fyri tykkum, og at tráa at tit máttu verðið fyltir við kunnleikanum til hansara vilja í øllum vísdómi og andligum skili;
10 At tit máttu ganga verdigir Harranum at øllum tokka, verandi fruktsamir í hvørjum góðum verki, og vaksandi í kunnleikanum til Guðs;
11 Styrktir við øllum mátti, samsvarandi við hansara dýrdarfullu kraft, at allari tolmóð og langmóð við gleðifullsemi;
12 Veitandi Faðirinum tøkkir, sum hevur gjørt okkum hóskiligar at vera luttakarar í arvi teirra heilagu í ljósi:
13 Sum[P] hevur útfríað okkum frá mátti myrkursins, og hevur umsett *okkum* inn í kongadømi kæra Sonar síns:
14 Í hvørjum[P] vit hava endurloysing gjøgnum blóð hansara, *enntá* fyrigeving syndanna:
15 Sum[P] er mynd hins ósjónliga Guðs, hin fyrstiføddi hjá hvørjum skapningi:
16 Tí at av honum vórðu øll ting skapað, sum eru í himni, og sum eru á jørð, sjónlig og ósjónlig, hvørt *tey veri seg* trónur, ella harradømir, ella fústadømir, ella máttir: øll ting vórðu skapað av honum, og til hansara:
17 Og hann er fyrr enn øll ting, og av honum øll ting hanga saman.
18 Og hann er høvur likamsins, kirkjunnar: hvør er byrjanin, hin fyrstiføddi frá teimum deyðu; at í øllum *tingum* hann mátti hava hina fremstu støðu.
19 Tí at tað hóvaði *Faðirinum,* at í honum øll fylling skuldi búgva;
20 Og, havandi gjørt frið gjøgnum blóð krossar hansara, viðˆ honum at gera øll ting sátt við seg; viðˆ honum, *sigi eg,* hvørt *tey veri seg* ting á jørð, ella ting í himni.
21 Og tykkum, sum vóru ēinaferð fremmandgjørdir og fíggindar í huga *tykkara* við vondum verkum, tó nú hevur hann endursónað
22 Í likami kjøts hansara gjøgnum deyða, *fyri* at seta tykkum fram heilagar og ólastiligar og óatfinniligar í eygsjón hansara:

23 Um tit haldi áfram í trúnni grundfestir og støðugir, og *verði* ikki fluttir burtur frá vón gleðiboðskaparins, sum tit hava hoyrt, *og* sum varð prædikaður fyri hvørjum skapningi sum er undir himni; hjá hvørjum eg, Paulus, eri gjørdur ein tænari;

24 Sum[P] nú fegnist í mínum líðingum fyri tykkum, og fylli upp tað sum vantar í av trongslum Christs í kjøti mínum, fyri likams hansara skuld, sum er kirkjan:

25 Hjá hvørji eg eri gjørdur ein tænari, samsvarandi við trúar-húshald Guðs, sum er givið til mín fyri tykkum, at uppfylla orð Guðs;

26 *Enntá* loyndardómurin sum hevur verið fjaldur frá øldum og frá ættum, men nú er gjørdur eyðsýndur fyri heiløgu hansara:

27 Fyri hvørjum[P] Guð vildi gera kunnugt, hvat *er* ríkdómurin av dýrdini av hesum loyndardómi millum Heidningarnar; sum er Christus í tykkum, vón dýrdarinnar:

28 Hvønn[P] vit prædika, ávarandi hvønn mann, og lærandi hvønn mann í øllum vísdómi; at vit mega seta fram hvønn mann fullkomnan í Christi Jesusi:

29 Hvarat eg eisini strevist, stríðandi samsvarandi við virkan hansara sum virkar í mær mektigani.

KAPITUL 2

TÍ at eg vildi at tit vitstu, hvat mikið stríð eg havi fyri tykkum, og *fyri* teir í Lâ-ŏ-dĭ-cē´-ŭ, og *fyri* so mangar sum hava ikki sæð mítt andlit í kjøtinum;

2 At teirra hjørtu máttu verða uggað, verðandi knýtt saman í kærleika, og at øllum ríkidømi av hini fullu sannføring av skili, til ásanningina av loyndardómi Guðs, og Faðirsins, og Christs;

3 Í hvørjum[P] eru fjaldir allir dýrgripir vísdóms og kunnleika.

4 Og hetta sigi eg, at ikki nakar maður skuldi tølt tykkum við lokkandi orðum.

5 Tí at tó *at* eg veri *meg* frástaddur í kjøtinum, tó eri eg hjá tykkum í andanum, fagnandi og skoðandi tykkara ordan, og støðufastleikan av tykkara trúgv á Christ.

6 Eins og tit hava tí tikið ímóti Christi Jesusi Harranum, *soleiðis* gangið tit í honum:

7 Rótfestir og uppbygdir í honum, og støðufestir í trúnni, eins og tit hava verðið lærdir, og fløðandi yvir í henni við takkarveitan.

8 Varið tykkum, at ikki nakar maður hertaki tykkum gjøgnum heimspeki og fáfongda villu, eftir siði manna, eftir barnalærdómum heimsins, og ikki eftir Christi.

9 Tí at í honum býr øll fyllingin av Guðhøvdinum likamliga.

10 Og tit eru fullførdir í honum, sum er høvdið hjá øllum fúrstadømi og mátti:

11 Í hvørjum[P] tit eisini eru umskornir við umskeringini — gjørd uttan hendur, í at latast úr likami kjøts-syndanna við umskering Christs:

12 Grivnir við honum í dópi, í hvørjum tit eisini eru risnir við *honum* gjøgnum trúgv útføringar Guðs, sum[P] hevur reist hann frá teimum deyðu.

13 Og tykkum, verandi deyðir í tykkara syndum og óumskering kjøts tykkara, hevur hann livandigjørt saman við honum, havandi fyrigivið tykkum allar misgerðir;

14 Slettandi út hondskriftina av fyriskipanum sum var ímóti okkum, sum var andstøðis okkum, og tók hana burtur, neglandi hana til kross hansara;

15 *Og,* havandi avvápnað fúrstadømir og máttir, helt hann sýning av teimum opinlýsliga, stórsigrandi yvir teimum í honum.

16 Latið ongan mann, tessvegna, døma tykkum í mati, ella

í drekka, ella hvat viðvíkur einum halgidegi, ella um nýmánan, ella um sabbats*dagarnar:*
17 Hvørji eru ein skuggi av komandi tingum; men likamið *er* Christs.
18 Latið ongan mann tøla tykkum frá tykkara sigursprísi í fríviljugari eyðmýkt og tilbiðjan av einglum, treingjandi inn í tey tingini sum hann hevur ikki sæð, fáfongdarligani uppblásin av sínum kjøtliga huga,
19 Og ei haldandi *fast við* Høvdið, frá hvørjum alt likamið, við liðum og bondum, fáandi nering tænaða, og bundið saman, veksur við vøkstri Guðs.
20 Hvørsvegna, um tit veri deyðir við Christi frá barnalærdómum heimsins, hví, sum um *tit* livdu í heiminum, eru tit undirgivnir fyri reglugerðum,
21 (Nem ikki við; smakka ikki; handfar ikki;
22 Hvørji øll eru *fyri* at týnast við nýtsluni;) eftir boðum og Guðslæru manna?
23 Hvørji ting víst hava eitt sýni av vísdómi í vilja-tilbiðjan, og eyðmýkt, og vanrøking av likaminum; ikki í nakrari æru til nøktingina av kjøtinum.

KAPITUL 3

UM tit tá veri risnir við Christi, søkið tey tingini sum eru fyri oman, har Christus situr við høgru hond Guðs.
2 Setið tykkar alsk á ting˘ fyri oman, ikki á ting˘ á jørðini.
3 Tí at tit eru deyðir, og tykkara lív er fjalt við Christi í Guði.
4 Tá ið Christus, *sum er* lív okkara, skal birtast, tá skulu tit eisini birtast við honum í dýrd.
5 Deyðið tí tykkara limir sum eru uppiá jørðini; siðloysi, óreinsku, ómátaliga yndan, illa lyst, og ágirnd, sum er avgudadýrkan:
6 Fyri hvørja luta skuld Guðs vreiði kemur á børn ólýdnisins:
7 Í hvørjum tit eisini gingu ēinaferð, tá ið tit livdu í teimum.
8 Men nú eisini tit, leggið av alt hetta; firtni, vreiði, illvilja, Guðsspottan, skitna samtalu út úr munni tykkara.
9 Lúgvið ikki hvør fyri øðrum, við tað at tit hava latist úr hinum gamla manni við gerðum hansara;
10 Og hava latist í hin nýggja *mann,* sum verður endurnýggjaður í kunnleika eftir mynd hansara sum skapti hann:
11 Har tað er hvørki Grikki ella Jødi, umskering ella óumskering, Barbári, Scý˙th-i, trælur *ella* frælsur: men Christus *er* alt, og í øllum.
12 Latist í tessvegna, sum hinir útvaldu Guðs, heilagu og hátt-elskaðu, innangoymslur av miskunnum, góðsku, lítillæti av sinni, eyðmjúkleika, langmóð;
13 Berandi yvir við hvør øðrum, og fyrigevandi hvør øðrum, um nakar maður havi kærumál ímóti nøkrum: enntá eins og Christus fyrigav tykkum, soleiðis eisini *gerið* tit.
14 Og uppum øll hesi ting, *latist í* vælvild, sum er band fullkominleikans.
15 Og latið frið Guðs ráða í tykkara hjørtum, til hvørs eisini tit eru kallaðir í ēinum likami; og verið tit takksamir.
16 Latið orð Christs búgva í tykkum ríkligani í øllum vísdómi; lærandi og áminnandi hvør annan við psálmum og lov-psálmum og andligum songum, syngjandi við náði í tykkara hjørtum til Harrans.
17 Og hvatsumhelst tit geri, í orði, ella gerningi, *gerið* alt í Harrans Jesu navni, veitandi tøkkir til Guðs og Faðirsins við^ honum.
18 Ektakonur, undirgevið tykkum sjálvar yvirfyri tykkara egnu ektamonnum, sum tað er hóskiligt í Harranum.

19 Ektamenn, elskið ektakonur *tykkara,* og verið ikki beiskir ímóti teimum.

20 Børn, lýðið *tykkara* foreldur í øllum tingum: tí at hetta er væl toknandi yvirfyri Harranum.

21 Fedrar, eggið ikki tykkara børn *til firtnis,* at ikki tey verði mótfallin.

22 Tænarar, lýðið í øllum tingum *tykkara* meistarar samsvarandi við kjøtið; ikki við eygnatænastu, sum manntoknarar; men í ēinfaldleika av hjarta, óttandi Guð:

23 Og hvatsumhelst tit geri, gerið *tað* hjartaliga, sum fyri Harranum, og ikki yvirfyri monnum;

24 Vitandi, at av Harranum skulu tit fáa arvs-endurgjaldið: tí at tit tæna Harranum Christi.

25 Men hann, sum ger órætt, skal fáa fyri tað órætta sum hann hevur gjørt: og har er eingin metan av persónum.

KAPITUL 4

MEISTARAR, gevið *tykkara* tænarum tað sum er rætt og rættvíst; vitandi, at tit eisini hava ein Meistara í himni.

2 Haldið áfram í bøn, og vakið í hini somu við takkarveitan;

3 Við *tí* øllum biðjandi eisini fyri okkum, at Guð vildi upplatið okkum einar mælsku-dyr, til at tala loyndardóm Christs, fyri hvønn eg eri eisini í bondum:

4 At eg má gera hann eyðsýndan, *so* sum eg átti at tala.

5 Gangið í vísdómi mótvegis teimum sum eru fyri uttan, leyskeypandi tíðina.

6 Latið tykkara talu *vera* alvegis við náði, kryddaða við salti, at tit mega vita hvussu tit áttu at svara hvørjum manni.

7 Allan mín tilstand skal Tȳch´-ĭ-cŭs kunngera tykkum, *sum er* ein háttelskaður bróðir, og ein trúfastur tænari og samtænari í Harranum:

8 Hvønn eg havi sent tykkum fyri hitt sama endamál, at hann mátti vita tykkara tilstand, og ugga tykkara hjørtu;

9 Við Ô-nēs´-ĭ-mŭs-i, einum trúføstum og háttelskaðum bróðuri, sum er *ēin* av tykkum. Teir skulu gera kunn tykkum øll ting sum *eru gjørd* her.

10 Ar-ĭs´-tar-chŭs, samfangi mín, letur heilsa tykkum, og Marcus, systirsonur hjá Barnabasi, (viðvíkjandi hvørjum tit fingu boð: um hann komi til tykkara, takið ímóti honum;)

11 Og Jesus, sum er kallaður Justus, sum eru av umskeringini. Hesir einans *eru* samarbeiðarar *mínir* at kongadømi Guðs, sum hava verið mær ein troyst.

12 Ēp´-ă-phrăs, sum er *ēin* av tykkum, ein tænari Christs, letur heilsa tykkum, altíð strevandi inniligani fyri tykkum í bønum, at tit mega standa fullkomnir og fullførir í øllum vilja Guðs.

13 Tí at eg beri honum frágreiðing, at hann hevur mikið vandlæti fyri tykkum, og teimum *sum eru* í Lâ-ŏ-dĭ-cē´-ŭ, og teimum í Hĭ-ĕr-ă´-pô-lĭs.

14 Lukas, háttelskaði læknin, og Dē´-măs, lata heilsa tykkum.

15 Heilsið brøðrunum sum eru í Lâ-ŏ-dĭ-cē´-ŭ, og Nym´-phăs-i, og kirkjuni sum er í húsi hansara.

16 Og tá ið hesin epistilin er lisin tykkara millum, berið so í bandi, at hann verði lisin eisini í kirkju Lâ-ŏ-dĭ-cē´-aranna; og at tit somuleiðis lesi *epistilin* frá Lâ-ŏ-dĭ-cē´-ŭ.

17 Og sig til Âr-chĭp´-pŭs-ar, Gev gætur eftir tænastuni, sum tú hevurt móttikið í Harranum, at tú uppfylli hana.

18 Heilsanin við^ hondini hjá mær, Paulusi. Minnist míni bond. Náði *veri* við tykkum. Ă´-mĕn.

¶ Skrivaður frá Róm til Colossensaranna av Tȳch´-ĭ-cŭs-i og Ô-nēs´-ĭ-mŭs-i.

HIN FYRRI
EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS
TIL
THESSALONICARANNA.

KAPITUL 1

PAULUS, og Sīl-vā´-nŭs, og Timotheus, til kirkju Thĕss-ă-lō´-nīc-aranna, *sum er* í Guði Faðirinum og *í* Harranum Jesusi Christi: Náði *veri* at tykkum, og friður, frá Guði Faðir várum, og Harranum Jesusi Christi.

2 Vit veita tøkkir til Guðs altíð fyri tykkum allar, nevnandi tykkum í bønum várum;

3 *Meðan vit* minnast uttan íhald tykkara verk av trúgv, og arbeiði av kærleika, og tolmóð av vón á váran Harra Jesus Christ, í eygsjón Guðs og Faðirs várs;

4 Vitandi, háttelskaðu brøður, tykkara útveljing av Guði.

5 Tí at okkara gleðiboðskapur kom ikki til tykkum í orði einans, men eisini í kraft, og í Halga Andanum, og í miklari vissu; eins og tit vita hvørsháttar menn vit vóru tykkara millum fyri tykkara skyld.

6 Og tit gjørdust eftirfylgjarar av okkum, og av Harranum, havandi tikið ímóti orðinum í miklari líðing, við gleði av Halga Andanum:

7 So at tit vóru fyrimyndir fyri øllum sum trúgva, í Măc-ĕ-dō´-nī-ŭ og Â-chāĭ´-ŭ.

8 Tí at frá tykkum ljóðaði út orð Harrans, ikki bert í Măc-ĕ-dō´-nī-ŭ og Â-chāĭ´-ŭ, men eisini í hvørjum plássi *sum* tykkara trúgv mótvegis Guði er spreidd útumkring; so at okkum nýtist ikki at tala nakað ting.

9 Tí at teir sjálvir sýna um okkum, hvørsháttar inngongd vit høvdu at tykkum, og hvussu tit vendu til Guðs frá avgudum til at tæna hinum livandi og sanna Guði;

10 Og at vænta eftir Syni hansara frá himni, hvønn hann reisti frá teimum deyðu, *enntá* Jesusi, sum útfríaði okkum frá hini komandi vreiðini.

KAPITUL 2

TÍ at tit sjálvir, brøður, vita okkara inngongd inn at tykkum, at hon var ikki í fáfongd:

2 Men sjálvt eftir at vit høvdu liðið frammanundan, og vórðu skammiliga viðfarnir, sum tit vita, í Philippī, vóru vit djarvir í Guði várum at tala tykkum gleðiboðskap Guðs við miklum stríði.

3 Tí at okkara formaning *var* ikki av villu, ella av óreinsku, ella av sviki:

4 Men eins og vit vórðu loyvdir av Guði at verða settir í álit við gleðiboðskapinum, enntá soleiðis tala vit; ikki sum toknandi monnum, men Guði, sum roynir hjørtu okkara.

5 Tí at hvørki á nøkrum sinni brúktu vit lifrandi orð, sum tit vita, ella eitt skálkaskjól av girnd; Guð *er* vitni:

6 Ella av monnum søktu vit heiður, eiheldur av tykkum, ella *tá* av øðrum, tá ið vit kundu havt verðið byrðusamir sum ápostlar Christs.

7 Men vit vóru mildir tykkara millum, enntá sum ein dadda hjúklar *um* síni børn:

8 Soleiðis verandi alskliga tráiligir um tykkum, vóru vit viljugir at hava tillutað tykkum, ikki gleðiboðskap Guðs einans, men eisini okkara egnu sálir, av tí at tit vóru okkum kærir.

9 Tí at tit minnast, brøður, okkara strev og stríð: tí at, strevandi nátt og dag, av tí at vit vildu ikki vera nøkrum av tykkum kravsamir, prædikaðu vit tykkum gleðiboðskap Guðs.

10 Tit *eru* vitnir, og Guð *eisini*, hvussu heilagliga og rættvísiliga og ólastiliga vit háttaðu okkum tykkara millum sum trúgva:
11 Sum tit vita, hvussu vit formanaðu og uggaðu og áløgdu hvørjum *og* ēinum av tykkum, eins og ein faðir *ger við* síni børn,
12 At tit vildu ganga verdigir av Guði, sum hevur kallað tykkum til kongadømis síns og dýrdar.
13 Fyri hesa grund eisini takka vit Guði uttan íhald, av tí at, tá ið tit tóku ímóti orði Guðs, sum tit hoyrdu av okkum, tóku tit ikki ímóti *tí sum* mannaorði, men sum tað er í sannleika, orð Guðs, sum virknaðarsamligani virkar eisini í tykkum sum trúgva.
14 Tí at tit, brøður, gjørdust eftirfylgjarar av kirkjum Guðs, sum í Judǣu eru í Christi Jesusi: tí at tit eisini hava liðið lík ting av tykkara egnu landsmonnum, enntá sum teir *hava* av Jødunum:
15 Sum bæði drópu Harran Jesus, og sínar egnu prophetar, og hava søkt at okkum; og teir toknast ikki Guði, og eru andstøðis móti øllum monnum:
16 Sýtandi okkum at tala til Heidninganna, at teir máttu verðið frelstir, til at fylla upp sínar syndir alveg: tí at vreiðin er komin uppá teir til hitt ytsta.
17 Men vit, brøður, verandi tiknir frá tykkum í eina stutta tíð í hjástøðu, ikki í hjarta, royndu tess meira ríkiliga at síggja andlit tykkara við miklari tráan.
18 Hvørsvegna vit vildu havt komið til tykkara, enntá eg, Paulus, ēinaferð og aftur; men Satan forðaði okkum.
19 Tí at hvat *er* okkara vón, ella gleði, ella fagnaðar-krúna? *Eru* ikki enntá tit í nærveru várs Harra Jesu Christs við hansara komu?
20 Tí at tit eru okkara heiður og gleði.

KAPITUL 3

HVØRSVEGNA, tá ið vit kundu ikki longur halda tað út, hildu vit tað gott at vera eftirlatnir í Athēn einsamallir;
2 Og sendu Timotheus, bróður okkara, og tænara Guðs, og okkara samarbeiðara í gleðiboðskapi Christs, at grundfesta tykkum, og at ugga tykkum viðvíkjandi trúgv tykkara:
3 At eingin maður skuldi verðið vikaður av hesum líðingunum: tí at tit sjálvir vita, at vit eru tilskilaðir hartil.
4 Tí at sanniliga, tá ið vit vóru hjá tykkum, søgdu vit tykkum áðrenn, at vit skuldu líða trongslu; enntá sum tað bar á, og tit vita.
5 Fyri hesa grund, tá ið eg kundi ikki longur halda tað út, sendi eg *fyri* at vita tykkara trúgv, at ikki við onkrum midlum freistarin havi freistað tykkum, og okkara arbeiði verði til einkiðs.
6 Men nú, tá ið Timotheus kom frá tykkum til okkum, og bar okkum góð tíðindir um tykkara trúgv og vælvild, og at tit hava góða endurminning um okkum altíð, stórliga tráandi at síggja okkum, sum vit eisini *at síggja* tykkum:
7 Tessvegna, brøður, vórðu vit uggaðir um tykkum í allari okkara líðing og neyð við^ trúgv tykkara:
8 Tí at nú liva vit, um tit standi fastir í Harranum.
9 Tí at hvørja tøkk kunnu vit veita til Guðs aftur fyri tykkum, fyri alla ta frøi, við hvørji vit frøast fyri tykkara sakir frammi fyri Guði várum;
10 Nátt og dag biðjandi ovurhondsligani, at vit máttu sæð andlit tykkara, og máttu fullkomnað tað sum vantar á í trúgv tykkara?
11 Nú, Guð sjálvur og Faðir vár, og vár Harri Jesus Christus, beini okkara veg at tykkum.
12 Og Harrin fái tykkum at

vaksa og ríkast í kærleika hvør mótvegis øðrum, og mótvegis øllum *monnum,* enntá sum vit *eru* mótvegis tykkum:

13 Til tess endamáls, *at* hann má grundfesta tykkara hjørtu ólastilig í heilagleika frammi fyri Guði, enntá Faðir várum, við komu várs Harra Jesu Christs við øllum hans heilagu.

KAPITUL 4

HARUMFRAMT so bøna vit tykkum, brøður, og formana *tykkum* við Harran Jesus, at eins og tit hava móttikið av okkum hvussu tit áttu at ganga og at toknast Guði, *soleiðis* tit vildu ríkast meira og meira.

2 Tí at tit vita, hvørji boð vit góvu tykkum við Harran Jesus.

3 Tí at hetta er Guðs vilji, *enntá* halgan tykkara, at tit skuldu halda *tykkum* frá siðloysi:

4 At hvør *og* ēin tykkara skuldi vita, hvussu at ogna *sær* sítt ker í heilagleika og heiðuri;

5 Ikki í girndarfýsni, enntá eins og Heidningarnir, sum kenna ikki Guð:

6 At eingin *maður* fari framum og svíki sín bróður í *nøkrum* máli: av tí at Harrin *er* hevnarin av øllum slíkum, eins og vit eisini hava fyrifram ávarað tykkum og vitnað.

7 Tí at Guð hevur ikki kallað okkum til óreinleika, men til heilagleika.

8 Hann, tessvegna, sum vanvirðir, vanvirðir ikki mann, men Guð, sum eisini hevur givið okkum sín heilaga Anda.

9 Men hvat varðar bróðurligan kærleika, nýtist tykkum ikki at eg skrivi tykkum: tí at tit sjálvir eru lærdir av Guði at elska hvør annan.

10 Og víst gera tit tað mótvegis øllum brøðrunum sum eru í allari Măc-ē-dŏ´-nĭ-ŭ: men vit bøna tykkum, brøður, at tit taki til meira og meira;

11 Og at tit studeri at vera stillir, og at gera tykkar egna gerning, og at arbeiða við tykkar egnu hondum, eins og vit buðu tykkum;

12 At tit mega ganga ærligani mótvegis teimum sum eru fyri uttan, og *at* tit mega hava trot á ongum tingi.

13 Men eg vildi ikki havt tykkum at verið óvitandi, brøður, viðvíkjandi teimum sum sova, at tit syrgi ikki, enntá eins og aðrir sum hava onga vón.

14 Tí at um vit trúgva, at Jesus doyði og reis aftur, enntá so teir eisini, sum sova í Jesusi, vil Guð føra við honum.

15 Tí at hetta siga vit tykkum við orði Harrans, at vit sum eru á lívi, *og* verða verandi *fram*at komu Harrans, skulu ikki koma fyrri *enn* teir sum sova.

16 Tí at Harrin sjálvur skal stíga niður frá himni við einum rópi, við rødd høvuðseingilsins, og við lúðri Guðs: og tey deyðu í Christi skulu rísa fyrst:

17 So skulu vit, sum eru á lívi *og* eru eftir, verða rykt upp saman við teimum í skýggjunum, at møta Harranum í luftini: og so skulu vit ævir vera hjá Harranum.

18 Hvørsvegna troystið hvør annan við hesum orðum.

KAPITUL 5

MEN um tíðirnar og tíðarskeiðini, brøður, hava tit ongan tørv *á* at eg skrivi tykkum.

2 Tí at tit sjálvir vita fullkomiligani, at dagur Harrans so kemur sum ein tjóvur á nátt.

3 Tí at tá ið teir skulu siga, Friður og tryggleiki; tá kemur brádlig oyðing uppá teir, eins og verkir uppá eina konu við barn; og teir skulu ei komast undan.

4 Men tit, brøður, eru ikki í myrkri, at tann dagur skuldi komið óvart á tykkum sum ein tjóvur.

5 Tit eru allir børn ljóssins, og

børn dagsins: vit eru ikki av náttini, ella av myrkri.
6 Tessvegna latum okkum ikki sova, eins og aðrir *gera;* men latum okkum vaka og vera edrúar.
7 Tí at teir, sum sova, sova um náttina; og teir, sum veri druknir, eru druknir um náttina.
8 Men latum okkum, sum eru av deginum, vera edrúar, farandi í bróstbrynju trúarinnar og kærleikans; og til hjálm, vón frelsunnar.
9 Tí at Guð hevur ikki fyriskipað okkum til vreiði, men at lutast frelsu við Harra okkara Jesusi Christi,
10 Sum doyði fyri okkum, til *tess* at, hvørt vit vaka ella sova, vit skuldu liva saman við honum.
11 Hvørsvegna uggið tykkum sjálvar saman, og uppbyggið hvør annan, enntá sum tit eisini gera.
12 Og vit bøna tykkum, brøður, at kenna teir sum streva tykkara millum, og eru yvir tykkum í Harranum, og áminna tykkum;
13 Og at meta teir sera hátliga*n*i í kærleika, vegna verk teirra. *Og* haldið frið tykkara millum.
14 Nú, vit formana tykkum, brøður, ávarið teir sum eru óstýrligir, uggið hinar hugveiku, styðjið hinar veiku, verið tolnir mótvegis øllum *monnum*.
15 Síggið til at eingin løni nøkrum *manni* ilt fyri ilt; men altíð fylgið tí sum er gott, bæði tykkara sjálvs millum, og fyri øllum *monnum*.
16 Fegnist ævirmeir.
17 Biðjið uttan íhald.
18 Í øllum tingum veitið tøkkir: tí at hetta er Guðs vilji í Christi Jesusi viðvíkjandi tykkum.
19 Sløkkið ikki Andan.
20 Vanmetið ikki propheteringar.
21 Roynið øll ting; haldið fast *við* tað sum er gott.
22 Haldið *tykkum* frá allari útsjónd av illum.
23 Og sjálvasti Guð friðarins halgi tykkum heilvegis; og *eg biði Guð,* at heilu tykkar andi og sál og likam verði varðveitt ólastandi til komu várs Harra Jesu Christs.
24 Trúfastur *er* hann sum kallar tykkum, sum eisini vil gera *tað*.
25 Brøður, biðjið fyri okkum.
26 Heilsið øllum brøðrunum við einum heilagum kossi.
27 Eg áleggi tykkum við Harran, at hesin epistil verði lisin fyri øllum hinum heilagu brøðrum.
28 Náði várs Harra Jesu Christs *veri* við tykkum. Á-měn.

¶ Hin fyrri *epistilin* til Thēss-ă-lō´-nīc-aranna varð skrivaður frá Athēn.

HIN SEINNI
EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS
TIL

THESSALONICARANNA.

KAPITUL 1

PAULUS, og Sīl-vā´-nŭs, og Timotheus, til kirkju Thēss-ă-lō´-nīc-aranna í Guði Faðir várum og Harranum Jesusi Christi:
2 Náði at tykkum, og friður, frá Guði Faðir várum og Harranum Jesusi Christi.
3 Vit eru skyldigir til at takka Guði altíð fyri tykkum, brøður, sum tað er sámiligt, av tí at tykkara trúgv veksur ovurhondsliga, og vælvildin hjá hvørjum ēin*støk*um av tykkum øllum hvør móti øðrum ríkast;
4 So at vit sjálvir rósa *okkum* í tykkum í kirkjum Guðs fyri

tykkara tolmóð og trúgv í øllum tykkara atsóknum og trongslum sum tit úthalda:

5 *Sum er* eitt eyðsýnt tekin um rættvísa dóm Guðs, at tit mega verða taldir verdir til kongadømis Guðs, fyri hvørt tit eisini líða:

6 Við tað *at tað er* eitt rættvíst ting hjá Guði at endurgjalda trongslu til teirra sum treingja tykkum;

7 Og til tykkara sum verða trongdir, hvíld við okkum, tá ið Harrin Jesus skal verða opinberaður frá himni við sínum mektigu einglum,

8 Í logandi eldi takandi hevnd yvir teir sum kenna ikki Guð, og sum lýða ikki gleðiboðskap várs Harra Jesu Christs:

9 Hvørjir verða skulu revsaðir við ævigtvarandi oyðing frá nærveru Harrans, og frá dýrdini av hansara kraft;

10 Tá ið hann skal koma *fyri* at verða dýrðmettur í sínum heilagu, og at verða eygleiddur í undran í øllum teimum sum trúgva, (av tí at okkara vitnisburði tykkara millum varð trúð), á tí degi.

11 Hvørsvegna vit eisini altíð biðja fyri tykkum, at Guð okkara vildi roknað tykkum verdigar til *hesa* kallan, og uppfylla allan góðtokkan av *síni* góðsemi, og trúarverkið við kraft:

12 At navn várs Harra Jesu Christs má verða dýrðmett í tykkum, og tit í honum, samsvarandi við náði Guðs várs og Harrans Jesu Christs.

KAPITUL 2

NÚ, vit bøna tykkum, brøður, við̂ komu várs Harra Jesu Christs, og *við̂* okkara savnan saman at honum,

2 At tit verði ikki skjótt skakaðir í sinni, ella verði órógvaðir, hvørki við̂ anda, ella við̂ orði, ella við̂ brævi sum frá okkum, sum at dagur Christs er fyri hond.

3 Latið ongan mann villleiða tykkum við nøkrum midlum: tí at *tann dagurin skal ikki koma,* uttan tað komi eitt fráfall fyrst, og hasin syndarinnar maðurin verði opinberaður, glatanarsonurin;

4 Sum stendur ímóti og hevjar seg sjálvan uppum alt sum verður kallað Guð, ella sum verður tilbiðið; so at hann sum Guð situr í templi Guðs, lýsandi seg sjálvan, at hann er Guð.

5 Minnast tit ikki, at tá ið eg var enn hjá tykkum, *tá* segði eg tykkum hesi tingini?

6 Og nú vita tit hvat heldur aftur, at hann mátti verðið opinberaður í tíð síni.

7 Tí at misgerðar-loyndardómurin virkar longu: einans hann, sum nú heldur aftur, *vil halda aftur,* inntil hann verði beindur burtur av veginum.

8 Og tá skal hasin Vondi verða opinberaður, hvønn Harrin skal upptæra við andanum av munni sínum, og skal oyða við bjartleikanum av komu síni:

9 *Enntá hann,* hvørs koma er eftir virkan Satans við allari kraft og teknum og lúgvandi undrum,

10 Og við allari villleiðiligsemi av órættvísi í teimum sum glatast; av tí at teir tóku ikki ímóti kærleikanum til sannleikan, at teir máttu verðið frelstir.

11 Og fyri hesa grund skal Guð senda teimum kraftmikla villu, at teir skuldu trúgva eini lygn:

12 At teir allir máttu verða heldømdir sum trúðu ikki sannleikanum, men høvdu hugnað í órættvísi.

13 Men vit eru skyldigir til at veita tøkkir alvegis til Guðs fyri tykkum, háttelskaðu brøður av Harranum, av tí at Guð hevur frá

byrjanini útvalt tykkum til frelsu gjøgnum halgan Andans og trúgv sannleikans:

14 At hvørjum hann kallaði tykkum við^ gleðiboðskapi okkara, til lutingina av dýrd várs Harra Jesu Christs.

15 Tessvegna, brøður, standið fastir, og haldið tær siðvenjur sum tit hava verðið lærdir, hvørt við^ orði, ella epistli okkara.

16 Nú, vár Harri Jesus Christus sjálvur, og Guð, enntá Faðir vár, sum hevur elskað okkum, og hevur givið *okkum* ævigtvarandi troyst og góða vón gjøgn náði,

17 Uggi hjørtu tykkara, og grundfesti tykkum í hvørjum góðum orði og verki.

KAPITUL 3

AT enda, brøður, biðjið fyri okkum, at Harrans orð má hava *frían* kós, og verða dýrðmett, enntá sum *tað er* hjá tykkum:

2 Og at vit mega verða útfríaðir frá órímiligum og vondum monnum: tí at allir *menn* hava ikki trúgv.

3 Men Harrin er trúfastur, sum skal grundfesta tykkum, og varðveita *tykkum* frá illum.

4 Og vit hava vissu í Harranum viðvíkjandi tykkum, at tit bæði geri og vilji gera tey tingini sum vit bjóða tykkum.

5 Og Harrin beini hjørtu tykkara inn í kærleika Guðs, og inn í hina tolmóðigu væntan eftir Christi.

6 Nú, vit ábjóða tykkum, brøður, í navni várs Harra Jesu Christs, at tit taki tykkum aftur frá hvørjum bróðuri sum gongur óreglusamligani, og ikki eftir teirri siðvenju sum hann móttók frá okkum.

7 Tí at tit sjálvir vita hvussu tit áttu at fylgja okkum: tí at vit hátt-aðu okkum ikki óreglusamligani tykkara millum;

8 Eiheldur ótu vit breyð nakars mans fyri einkið; men arbeiddu við stríði og strevi nátt og dag, at vit máttu ikki verða kravsamir fyri nøkrum av tykkum:

9 Ikki av tí at vit hava ikki mátt, men *fyri* at gera okkum sjálvar *til* eitt fyridømi fyri tykkum, til at fylgja okkum.

10 Tí at sjálvt tá ið vit vóru hjá tykkum, hetta buðu vit tykkum, at um nakar vildi ikki arbeiða, eiheldur skuldi hann eta.

11 Tí at vit hoyra, at tað eru summir sum ganga tykkara millum óreglusamligani, als ikki arbeiðandi, men eru sneytidólgar.

12 Nú teimum, sum eru slíkir, bjóða vit og formana við Harra váran Jesus Christ, at við stillføri teir arbeiði, og eti sítt egna breyð.

13 Men tit, brøður, verðið ikki troyttir í vælgering.

14 Og um nakar maður lýði ikki orði okkara við hesum epistli, merkið *tykkum* tann mann, og havið einkið samlag við hann, at hann má skammast.

15 Tó roknið *hann* ikki sum ein figginda, men áminnið *hann* sum ein bróður.

16 Nú, Harri friðarins sjálvur gevi tykkum frið altíð á allan hátt. Harrin *veri* við tykkum øllum.

17 Heilsan Paulusar við^ míni egnu hond, sum er teknið í hvørjum epistli: soleiðis skrivi eg.

18 Náði várs Harra Jesu Christs *veri* við tykkum øllum. Á-měn.

¶ Hin seinni *epistilin* til Thĕss-ă-lō´-nīc-aranna varð skrivaður frá Athēn.

HIN FYRRI EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS TIL TIMOTHEUSAR.

KAPITUL 1

PAULUS, ein ápostul Jesu Christs viðˆ boði Guðs Frelsara várs, og Harra Jesu Christs, *sum er* vón okkara;

2 Til Timotheusar, *míns* egna sonar í trúnni: Náði, miskunn, *og* friður, frá Guði Faðir várum og Jesusi Christi Harra várum.

3 Eins og eg bønaði teg at verða *verandi* enn í Ē-phē-sūs, tá ið eg fór inn í Măc-ĕ-dō-nī-ŭ, at tú máttirt áleggja summum, at teir frálæri onga aðra Guðslæru,

4 Eiheldur gevi gætur eftir fáblum og endaleysum ættartølum, sum tæna *út* spurningar, heldur enn gudiliga uppbygging sum er í trúgv: *soleiðis ger.*

5 Nú, endamál boðsins er vælvild út av einum reinum hjarta, og *av* eini góðari samvitsku, og *av* trúgv ófalsaðari:

6 Frá hvørjum summir, havandi sveimað, hava vent til viks at fáfongdari keglan;

7 Tráandi at vera frálærarar av lógini; skiljandi hvørki hvat teir siga, ella um hvat teir tvíhalda.

8 Men vit vita, at lógin *er* góð, um ein maður brúki hana lógliga;

9 Vitandi hetta, at lógin er ikki gjørd til ein rættvísan mann, men til hinar lógleysu og ólýdnu, til hinar ógudiligu og til syndarar, til vanheilagar og halgivanvirðandi, til myrðarar av fedrum og myrðarar av møðrum, til manndráparar,

10 Til horkallar, til teir sum dálka seg sjálvar við mannkyni, til mannatjóvar, til lygnarar, til meinsvornar persónar, og um tað veri *seg* nakað annað ting sum er andstatt við heilnæma Guðslæru;

11 Samsvarandi við hin dýrdsama gleðiboðskap hins signaða Guðs, sum mær varð litin til.

12 Og eg takki Christi Jesusi Harra várum, sum hevur gjørt meg føran, fyri at hann roknaði meg trúfastan, setandi meg inn í tænastu;

13 Sum áður var ein Guðsspottari, og ein atsøkjari, og skaðiligur: men eg vann miskunn, av tí at eg gjørdi *tað* fákunnugligani í vantrúgv.

14 Og náði várs Harra var ovurhonds ríkilig við trúgv og kærleika, sum er í Christi Jesusi.

15 Hetta *er* ein trúføst framsøgn, og verdug alla viðtøku, at Christus Jesus kom inn í heimin at frelsa syndarar; av hvørjum eg eri fremstur.

16 Hvussu enn er, fyri hesa grund vann eg miskunn, at í mær fyrst Jesus Christus mátti sýna fram alla langmóð, til eitt mynstur til teirra sum skuldu hereftir trúgva á hann til ævigtvarandi lívs.

17 Nú, hinum æviga Kongi, ódeyðiliga, ósjónliga, hinum ēinasta vísa Guði, *veri* heiður og dýrd um ævir og ævir. Á-měn.

18 Hesa álegging líti eg tær til, sonur *mín* Timotheus, samsvarandi við prophetīini sum fóru áður á teg, at tú við teim máttirt kríggja eina góða krígsførslu;

19 Haldandi trúgv, og góða samvitsku; sum summir, havandi lagt burtur viðvíkjandi trúgv, hava liðið skipbrot:

20 Av hvørjum er Hý-mē-næ-ŭs og Alexander; hvørjar eg havi givið upp til Satan, at teir mega læra ikki at Guðsspotta.

KAPITUL 2

EG formani tessvegna, at, fyrst av øllum, áheitanir, bønir, fyribønir, *og* veitan av tøkkum, verði gjørd fyri øllum monnum;

2 Fyri kongum, og *fyri* øllum sum eru í myndugleika, at vit mega føra eitt stilt og friðsamt lív í øllum gudiligleika og ærligleika.

3 Tí at hetta *er* gott og góðtakiligt í eygsjón Guðs Frelsara várs;

4 Sum vil hava allar menn at verða frelstar, og at koma at kunnleikanum til sannleikan.

5 Tí at *tað er* ēin Guð, og ēin millumgongumaður ímillum Guð og menn, maðurin Christus Jesus;

6 Sum gav seg sjálvan — eitt loysnargjald fyri allar, at verða vitnað í rættari tíð.

7 Hvarat eg eri innsettur ein prædikumaður, og ein ápostul, (eg tali sannleikan í Christi, *og* lúgvi ikki;) ein lærari av Heidningunum í trúgv og sannleika.

8 Eg vil tí, at menn biðji allar staðir, lyftandi upp heilagum hondum, uttan vreiði og iving.

9 Á líkan hátt eisini, at kvinnur prýði seg sjálvar í sámiligum klædnaði, við blúvsemi og hóvsemi; ikki við skreytaðum hári, ella gulli, ella perlum, ella kostsomum skarti;

10 Men, (sum sømir kvinnum, játtandi gudiligleika), við góðum verkum.

11 Lat kvinnuna læra í kvirri við allari undirgivni.

12 Men eg loyvi ikki kvinnu at frálæra, ella at tilræna myndugleika yvir manninum, men at vera í kvirri.

13 Tí at Adam varð fyrst myndaður, síðan Eva.

14 Og Adam varð ikki teipaður, men kvinnan, verðandi teipað, var í misgerðini.

15 Hóast hetta, hon skal verða frelst í barnsføðing, um tær haldi áfram í trúgv og vælvild og heilagleika við hóvsemi.

KAPITUL 3

HETTA *er* ein sonn framsøgn, Um ein maður trái biskups-embætið, hann tráar eitt gott verk.

2 Ein biskupur tá má vera ólastandi, ektamaðurin hjá ēinari ektakonu, árvakin, edrúiligur, av góðum atburði, givin til gestablídnis, skikkaður at frálæra;

3 Ikki givin til vín, eingin slári, ikki grádigur eftir skitnum vinningi; men tolinmóðigur, ikki eitt klandursvætti, ikki ágirndarsamur;

4 Ēin sum stjórnar væl sínum egna húsi, havandi síni børn í undirgivni við allari sómasemi;

5 (Tí at um ein maður viti ikki hvussu stjórna *eigur* sínum egna húsi, hvussu skal hann taka sær av kirkju Guðs?)

6 Ikki ein nýumvendingi, at ikki, verðandi lyftur upp við dramblæti, hann falli inn í fordøming djevulsins.

7 Harafturat má hann hava gott ummæli av teimum sum eru fyri uttan; at ikki hann falli inn í vanæru og snerru djevulsins.

8 Líkaleiðis *mugu* deknarnir *vera* virðiligir, ikki tvítungutir, ikki givnir til nógv vín, ikki grádigir eftir skitnum vinningi;

9 Haldandi loyndardóm trúarinnar í eini reinari samvitsku.

10 Og lat hesar eisini fyrst verða royndar; síðan lat teir brúka dekna-embætið, verðandi *funnir* ólastandi.

11 Enntá soleiðis *mugu teirra* konur *vera* virðiligar, ikki baktalarar, edrúiligar, trúfastar í øllum lutum.

12 Lat deknarnar vera ektamenninar hjá ēinari ektakonu, stjórnandi børnum sínum og egnu húsum sínum væl.
13 Tí at teir, sum hava brúkt dekna-embætið væl, útvega til sín sjálvs eina góða støðu, og mikið dirvi í trúnni sum er á Christ Jesus.
14 Hesi tingini skrivi eg til tín, vónandi at koma til tín skjótliga:
15 Men um eg dráli leingi, *fyri* at tú mást vita hvussu tú áttirt at hava tína atferð í húsi Guðs, sum er kirkja hins livandi Guðs, stólpi og grundvøllur sannleikans.
16 Og uttan stríðsmál, mikil er loyndardómur gudiligleikans: Guð varð givin til kennar í kjøtinum, rættvísgjørdur í Andanum, sæddur av einglum, prædikaður Heidningunum, trúðin á í heiminum, móttikin upp inn í dýrd.

KAPITUL 4

NÚ, Andin talar týðiliga, at í hinum seinnu tíðunum skulu summir fara burtur frá trúnni, gevandi gætur eftir tølandi andum, og Guðslærum av djevlum;
2 Talandi lygnir í hykli; havandi sína samvitsku brennimerkta við einum heitum jarni;
3 Forbjóðandi at giftast, *og bjóðandi* at fráhalda frá matum, sum Guð hevur skapt til at verða tiknar ímóti við takkarveitan av teimum sum trúgva og kenna sannleikan.
4 Tí at hvør skapningur Guðs *er* góður, og einkið at verða havnað, um tað verði tikið ímóti við takkarveitan:
5 Tí at tað verður halgað við Guðs orði og bøn.
6 Um tú seti brøðurnar í endurminning um hesi ting, skalt tú vera ein góður tænari Jesu Christs, nørdur upp í trúar-orðunum og av góðari Guðslæru, hvarat tú hevurt nátt.
7 Men havna halgivanvirðandi og gamalkvendis fáblum, og ven teg *heldur* til gudiligleika.
8 Tí at likamlig venjing gagnar lítið: men gudiligleiki er gagnligur øllum lutum, havandi fyrijáttan til lívið sum nú er, og til tað sum koma skal.
9 Hetta *er* ein trúføst framsøgn, og verdug alla viðtøku.
10 Tí at tessvegna bæði streva vit og líða vansømd, av tí at vit líta á hin livandi Guð, sum er Frelsari alra manna, serliga teirra sum trúgva.
11 Hesar lutir bjóða og frálær.
12 Lat ongan mann vanvirða ungdóm tín; men ver tú ein fyrimynd hjá teimum trúgvandi, í orði, í atferð, í vælvild, í anda, í trúgv, í reinleika.
13 Til eg komi, gev umvartan til uppleesturs, til formaning, til Guðslæru.
14 Vanrøk ikki gávuna sum í tær er, sum varð givin tær við prophetii, við áleggingini av hondum elstaráðsins.
15 Grunda yvir hesum tingum; gev teg heilvegis til teirra; at tín framgongd má sýnast fyri øllum.
16 Gev gætur eftir tær sjálvum, og eftir Guðslæruni; halt áfram í teimum: tí at við at gera hetta skalt tú frelsa bæði teg sjálvan, og tey sum hoyra teg.

KAPITUL 5

HARTA ikki ein elsta, men bøna *hann* sum ein faðir; *og* hinar yngru menninar sum brøður;
2 Hinar eldru kvinnurnar sum møður; hinar yngru sum systrar, við øllum reinleika.
3 Æra einkjur, sum í roynd *og veru* eru einkjur.

4 Men um nøkur einkja havi børn ella barnabørn, lat tey læra fyrst at sýna virðing heima, og at viðurgjalda foreldrum sínum: tí at tað er gott og góðtakiligt frammi fyri Guði.
5 Nú, hon sum er ein einkja í roynd *og veru*, og stendur á berum, lítur á Guð, og heldur áfram í áheitanum og bønum nátt og dag.
6 Men hon, sum livir í njóting, er deyð meðan hon livir.
7 Og hesar lutir gev í álegging, at tey mega vera ólastandi.
8 Men um nakar skaffi ikki fyri sínum egnu, og serstakliga fyri teimum av sínum egna húsi, hann hevur avnoktað trúnna, og er verri enn ein vantrúgvandi.
9 Lat ikki einkju verða tikna uppí talið undir trísinstjúgu ára gamla, havandi verið ektakonan hjá ēinum ektamanni,
10 Væl ummæld um fyri góð verk; um hon havi alið upp børn, um hon havi hýst fremmandum, um hon havi tvigið føtur hinna heilagu, um hon havi lætt um hini trongslaðu, um hon havi dúgligani fylgt hvørjum góðum verki.
11 Men hinar yngru einkjur frávís: tí at tá ið tær eru byrjaðar at gerast teymaleysar ímóti Christi, vilja tær giftast;
12 Havandi heldøming, av tí at tær hava kastað av sína fyrstu trúgv.
13 Og við øllum læra tær *at vera* yrkisleysar, flakkandi um frá húsi til húss; og ikki bert yrkisleysar, men sleygarar eisini og sneytivættir, talandi tingˇ sum tær áttu ikki.
14 Eg vil tessvegna, at hinar yngru kvinnur giftist, eigi børn, leiði húsið; gevi einkið føri til mótstandaran at tala háðisliga.
15 Tí at summar eru longu vendar til viks eftir Satan.
16 Um nakar maður ella kvinna, sum trýr, havi einkjur, lat tey lætta um hjá teimum, og lat ikki kirkjuna verða byrðaða; at hon má lætta um hjá teimum sum eru einkjur í roynd *og veru*.
17 Lat teir elstar, sum stjórna væl, verða taldar tvífaldan heiður verdar, serstakliga teir sum strevast í orðinum og Guðslæru.
18 Tí at skriftin sigur, Tú skalt ikki múlabinda oksan sum treskir út kornið. Og, Verkamaðurin *er* sítt endurgjald verdigur.
19 Ímóti einum elsta tak ikki ímóti ákæru, uttan frammi fyri tveimum ella trimum vitnum.
20 Teir, sum synda, harta frammi fyri øllum, at aðrir eisini mega óttast.
21 Eg áleggi *tær* frammi fyri Guði, og Harranum Jesusi Christi, og hinum útvaldu einglum, at tú gái eftir hesum tingum uttan at taka ēin framum annan, gerandi einkið viðˇ partískni.
22 Legg hendur brádligani á ongan mann, eiheldur ver luttakari í syndum annara manna: halt teg sjálvan reinan.
23 Drekk ikki longur vatn, men bróka eitt sindur *av* víni fyri maga tíns skuld og tínar títtu veikleikar.
24 Syndirnar hjá summum monnum eru opinlýsar frammanundan, farandi undan til dóms; og summum *monnum* fylgja tær aftaná.
25 Somuleiðis eisini eru góðu verkini *hjá summum* eyðsýnd frammanundan; og tey, sum eru øðrvísi, kunnu ei verða fjald.

KAPITUL 6

LAT so mangar tænarar, sum eru undir okinum, rokna sínar egnu meistarar allan heiður verdar, at navn Guðs og Guðslæra *hansara* verði ikki Guðsspottað.

2 Og teir, sum hava trúgvandi meistarar, lat teir ikki vanvirða *teir,* av tí at teir eru brøður; men heldur gera *teimum* tænastu, av tí at teir eru trúfastir og hátt-elskaðir, luttakarar í ágóðanum. Hesar lutir frálær og formana.

3 Um nakar maður frálæri øðrvísi, og ájátti ei til heilnæmra orða, *enntá* orða várs Harra Jesu Christs, og til Guðslæruna sum er samsvarandi við gudiligleika;

4 Hann er hástórur, vitandi einkið, men sjúkur eftir spurningum og orðastríðum, av hvørjum kemur øvund, stríð, útskeldanir, óndir illgrunar,

5 Rangvørgir orðadráttir av monnum av spiltum hugum, og eiðasørir fyri sannleikanum, haldandi at vinningur er gudiligleiki: frá slíkum hav teg undan.

6 Men gudiligleiki við nøgdsemi er mikil vinningur.

7 Tí at vit førdu einkið inn í *henda* heim, *og tað er* víst — vit kunnu bera einkið út.

8 Og, havandi mat og klæði, latum okkum vera nøgdar harvið.

9 Men teir, sum vilja verða ríkir, falla inn í freisting og snerru, og *inn í* mangar fávitskuligar og skaðiligar girndir, sum søkkja menn í oyðilegging og glatan.

10 Tí at peninga-alskurin er rót als ils: sum, meðan summir girnaðust eftir, teir eru farnir skeivir frá trúnni, og *hava* gatað seg sjálvar ígjøgnum við mongum sorgum.

11 Men tú, O Guðs maður, flýggja hesar lutir; og fylg eftir rættvísi, gudiligleika, trúgv, kærleika, tolmóði, eyðmýkt.

12 Stríð hitt góða trúarstríð, legg hald á ævigt lív, hvarat tú ert eisini kallaður, og hevurt viðurkent eina góða játting frammi fyri mongum vitnum.

13 Eg gevi tær álegging í eygsjón Guðs, sum[P] livandiger øll ting, og *frammi fyri* Christi Jesusi, sum[P] frammi fyri Pontiusi Pilatusi vitnaði eina góða játting;

14 At tú haldi *hetta* boð uttan blett, ólastiligt, inntil birting várs Harra Jesu Christs:

15 Sum í sínum tíðum hann skal sýna, *hvør er* hin vælsignaði og einasti Veldisharri, Kongur konga, og Harri harra;

16 Sum einastur hevur ódeyðiligleika, búgvandi í ljósinum sum eingin maður kann nærkast at; hvønn eingin maður hevur sæð, ella kann síggja: til hvørs *veri* heiður og máttur ævigtvarandi. Á-měn.

17 Álegg teimum sum eru ríkir í hesum heimi, at teir veri ikki hástórir, ella troysti á óviss ríkidømir, men á hin livandi Guð, sum gevur okkum rík ligani øll ting at njóta;

18 At teir geri gott, at teir veri ríkir í góðum verkum, fúsir at útluta, viljugir at deila;

19 Leggjandi niðurfyri í goymslu til sín sjálvs ein góðan grundvøll ímóti hini komandi tíð, at teir mega leggja hald á ævigt lív.

20 O Timotheus, varðveit tað sum tær er litið til, skýggjandi vanheilagar *og* fáfongdar blabbanir, og mótstøður av vitinskapi — falsliga sokallaðum:

21 Sum, summir játtandi, eru farnir skeivir viðvíkjandi trúnni. Náði *veri* við tær. Á-měn.

¶ Hin fyrri til Timotheusar varð skrivaður í Lâ-ŏ-dĭ-cĕ´-ŭ, sum er hin fremsti staðurin av Phrý´-gĭ-ŭ Pă-çă-tĭ-ă´-nŭ.

HIN SEINNI EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS TIL TIMOTHEUSAR.

KAPITUL 1

PAULUS, ein ápostul Jesu Christs viðˆ vilja Guðs, samsvarandi við fyrijáttan lívs, sum er í Christi Jesusi,

2 Til Timotheusar, *míns* kærliga elskaða sonar: Náði, miskunn, *og* friður, frá Guði Faðirinum og Christi Jesusi Harra várum.

3 Eg takki Guði, hvørjum eg tæni frá forfedrum *mínum* við reinari samvitsku, at uttan íhald eg havi endurminning um teg í bønum mínum nátt og dag;

4 Stórligani tráandi at sjá teg, verandi minnugur um tár tíni, at eg má verða fyltur við gleði;

5 Tá ið eg kalli til endurminningar hina ófalsaðu trúgv sum er í tær, sum fyrst búði í ommu tíni Lŏ´-ĭs, og móður tíni Ĕv-nĭ´-çŭ; og eg eri sannførdur at eisini í tær.

6 Hvørsvegna eg seti teg í endurminning, at tú veki upp ta Guðs gávu, sum er í tær við álegging handa mína.

7 Tí at Guð hevur ikki givið okkum anda ótta; men kraftar, og kærleiks, og av einum sunnum sinni.

8 Skammast tú tessvegna ikki við vitnisburðin um váran Harra, ella við meg, fanga hansara: men vert tú luttakari í líðingum gleðiboðskaparins samsvarandi við kraft Guðs;

9 Sumᵖ hevur frelst okkum, og kallað *okkum* við heilagari kallan, ikki samsvarandi við verkˇ okkara, men samsvarandi við sína egnu fyriætlan og náði, sum varð givin okkum í Christi Jesusi áðrenn verøldin byrjaði,

10 Men er nú gjørd eyðsýnd við birting Frelsara várs Jesu Christs, sumᵖ hevur tileinkiðsgjørt deyða, og hevur ført lív og ódeyðiligleika í ljós gjøgnum gleðiboðskapin:

11 Hvarat eg eri útnevndur ein prædikumaður, og ein ápostul, og ein lærari av Heidningunum.

12 Fyri hvørs skuld eg eisini líði hesi ting: hóast hetta, eg skammist ikki: tí at eg veit hvørjumᵖ eg havi trúð, og eri sannførdur *um,* at hann er førur fyri at varðveita tað, sum eg havi litið upp til hansara, ímóti hinum degi.

13 Halt fast tað sniðið á heilnomum orðum, sum tú hevurt hoyrt av mær, í trúgv og kærleika, sum er í Christi Jesusi.

14 Hatta góða ting, sum tær varð litið til, varðveit við Halga Andanum sum býr í okkum.

15 Hetta tú veitst, at allir teir, sum eru í Asiu, veri vendir burtur frá mær; av hvørjum eru Phŷ-gĕl´-lŭs og Hĕr-mô-gĕ´-nĕs.

16 Harrin gevi húsi Ô-nês-ĭ-phō´-rŭs-ar náði; tí at hann ofta endurlívgaði meg, og skammaðist ikki við leinkju mína:

17 Men, tá ið hann var í Róm, leitaði hann meg upp sera ídnisligani, og fann *meg.*

18 Harrin veiti honum, at hann má finna miskunn av Harranum á hīnum degi: og í hvussu mongum tingum hann tænti mær í Ē´-phĕ-sŭs, veitst tú sera væl.

KAPITUL 2

TÚ, tessvegna, sonur mín, ver sterkur í náðini, sum er í Christi Jesusi.

2 Og tey ting sum tú hevurt hoyrt av mær millum mong vitnir, hini somu líti tú trúføstum monnum til, sum skulu vera førir fyri at læra onnur eisini.

3 Tú tessvegna, halt út tvørleika, sum ein góður hermaður Jesu Christs.

4 Eingin maður, sum kríggjar, fløkir seg upp í viðurskiftini av *hesum* lívi; *fyri* at hann má toknast honum sum hevur útvalt hann til at vera ein hermaður.

5 Og um ein maður eisini strembi eftir meistaraheitum, *tó* verður hann ikki krýndur, uttan hann strembi lógliga.

6 Bóndin, sum arbeiðir, eigur fyrstur at verða luttakari í ávøkstunum.

7 Gev gætur eftir hvat eg sigi; og Harrin gevi tær skyn á øllum tingum.

8 Minst til at Jesus Christus, av sáði Dávids, varð reistur frá teimum deyðu, samsvarandi við gleðiboðskap mín:

9 Í hvørjum eg líði kvalir, sum ein illgerðarmaður, *enntá* at bondum; men Guðs orð er ikki bundið.

10 Tí haldi eg út øll ting fyri hinna útvaldu sakir, at tey mega eisini lutast frelsuna, sum er í Christi Jesusi, við ævigari dýrd.

11 *Tað er* ein trúføst framsøgn: Tí at um vit veri deyðir við *honum,* skulu vit eisini liva við *honum:*

12 Um vit líða, skulu vit eisini ráða við *honum:* um vit avnokta *hann,* vil hann eisini avnokta okkum:

13 Um vit trúgva ikki, hann *tó* verður *verandi* trúgvur: hann kann ikki avnokta seg sjálvan.

14 Um hesi tingini set *teir* í endurminning, áleggjandi *teimum* frammi fyri Harranum, at teir striði ikki um orð˘ at ongum gagni, *men* til umkollkoyringina av hoyrarunum.

15 Studera at sýna teg sjálvan viðurkendan yvirfyri Guði, ein verkamann sum tarvast ikki at skammast, rættliga deilandi sannleiks-orðið.

16 Men skýggja vanheilagt *og* fáfongt skvaldur: tí at teir vilja vaksa at meiri ógudiligleika.

17 Og teirra orð vil eta sum ger ein kolubrandur: av hvørjum er Hý-mē-næ´-ūs og Phī-lē´-tūs;

18 Hvørjir, viðvíkjandi sannleikanum, eru farnir skeivir, sigandi at uppreisnin er umliðin longu; og hvølva trúnna hjá summum.

19 Hóast hetta, grundvøllur Guðs stendur tryggur, havandi hetta innsigli, Harrin kennir teir sum eru hansara. Og, Lat hvønn tann, sum nevnir navn Christs, víkja frá misgerð.

20 Men í einum stórum húsi eru tað ikki einans ker úr gulli og silvuri, men eisini úr træi og úr leiri; og summi til heiðurs, og summi til vanheiðurs.

21 Um ein maður tí reinski seg sjálvan frá hesum, hann skal verða eitt ker til heiðurs, halgað, og hóskiligt til nýtslu meistarans, *og* fyribúgvið at hvørjum góðum verki.

22 Flýggja eisini ungdómsligar lystir: men fylg rættvísi, trúgv, vælvild, frið; við teimum sum kalla á Harran út úr einum reinum hjarta.

23 Men fávitskuligar og ólærdar spurningar skýggja, vitandi at teir *fram*ala stríð˘.

24 Og tænari Harrans má ikki stríða; men vera mildur at øllum *monnum,* skikkaður til at frálæra, tolin,

25 Í eyðmjúkleika undirvísandi teimum sum seta seg ímóti; um Guð møguligvís vilji geva teim umvending til viðurkenningina av sannleikanum;

26 Og *at* teir mega koma sær aftur fyri seg út úr snerru djevul-

sins, sum eru tiknir *til* fanga av honum eftir vilja hansara.

KAPITUL 3

HETTA viti eisini, at í hinum síðstu døgum skulu koma váðasamar tíðir.

2 Tí at menn skulu vera elskarar síns egna sjálvs, ágirndarsamir, reyparar, hugmóðigir, Guðsspottarar, óhoyriligir móti foreldrum, ótakksamir, vanheilagir,

3 Uttan náttúrligan alsk, sáttmálabrótarar, falskir ákærarar, ósærstýrligir, harðligir, vanvirðarar av teim sum eru góðir,

4 Svíkjarar, framlopnir, uppblásnir, elskarar av njótingum meiri enn elskarar av Guði;

5 Havandi ein form av gudiligleika, men avnoktandi kraftina av honum: frá slíkum vend burtur.

6 Tí at av hesum slagi eru teir sum sníkjast inn í hús, og leiða *til* fanga fjákutar kvinnur — løddar við syndum, leiddar burtur við ymsum lystum,

7 Altíð lærandi, og aldri førir fyri at koma til kunnleikan um sannleikan.

8 Nú, eins og Jănˊnēs og Jămˊbrēs stóðu ímóti Mósesi, soleiðis standa eisini hesir ímóti sannleikanum: menn av spiltum hugum, afturrekingar viðvíkjandi trúnni.

9 Men teir skulu ei fara longur fram: tí at teirra dárskapur skal verða eyðsýndur øllum *monnum,* eins og teirra eisini varð.

10 Men tú hevurt *til* fulnar kent mína Guðslæru, lívsførslu, endamál, trúgv, langmóð, vælvild, tolmóð,

11 Atsóknir, líðingar, sum komu til mín í Ăn-tī-ō´-chĭ-ŭ, í Ī-cō´-nĭ-ŭm, í Lýsˊ-trŭ; hvørjar atsóknir eg útstóð: men út úr *teim* øllum Harrin útfríaði meg.

12 Ja, og allir, sum vilja liva gudiliga í Christi Jesusi, skulu líða atsókn.

13 Men óndir menn og tølarar skulu vaksa verri og verri, villleiðandi, og verðandi villleiddir.

14 Men halt tú áfram í teim tingunum sum tú hevurt lært, og ert vorðin sannførdur um, vitandi av hvørjum[p] tú hevurt lært *tey;*

15 Og at frá barni *av* tú hevurt kent hinar heilagu skriftir, sum eru førar fyri at gera teg vísan til frelsu, gjøgnum trúgv sum er á Christ Jesus.

16 Øll skrift *er* givin við íblástri av Guði, og *er* gagnlig til Guðslæru, til írættaseting, til rættleiðing, til undirvísing í rættvísi:

17 *Fyri* at Guðs maðurin má vera fullkomin, fullvegis útgjørdur at øllum góðum verkum.

KAPITUL 4

EG áleggi *tær* tí frammi fyri Guði, og Harranum Jesusi Christi, hvør døma skal hinar livandi og hinar deyðu við birting sína og kongadømi sítt;

2 Prædika orðið; ver í klárstøðu í tíð, uttanfyri tíð; írættaset, harta, formana við allari langmóð og Guðslæru.

3 Tí at tann tíð vil koma, tá ið teir vilja ikki úthalda heilnæma Guðslæru; men eftir sínum egnu lystum skulu teir hópa til sín sjálvs frálærarar, havandi skriðandi oyru;

4 Og teir skulu venda burt *síni* oyru frá sannleikanum, og skulu verða vendir at fáblum.

5 Men vak tú í øllum lutum, halt út líðingar, ger evangelists verk, ger fult prógv um tænastu tína.

6 Tí at eg eri nú tilreiðar at verða ofraður, og tíðin av míni fráferð er fyri hond.

7 Eg havi barst ein góðan bardaga, eg havi fullført skeið *mítt,* eg havi varðveitt trúnna:

8 Hiðanífrá er tað goymd niðurfyri til mín ein rættvísis-krúna, sum Harrin, hin rættvísi dómarin, skal geva mær á hīnum degi:

og ikki til mín einans, men øllum teimum eisini sum elska hansara birting.

9 Ger títt ídni at koma brátt til mín:

10 Tí at Dē´-mās hevur yvirgivið meg, havandi elskað henda núverandi heim, og er farin avstað til Thēss-ă-lō´-nī-cŭ; Crēs´-çēns til Galatiu, Titus at Dalmatiu.

11 Einans Lukas er hjá mær. Tak Markus, og før hann við tær: tí at hann er gagnligur hjá mær til tænastuna.

12 Og Tȳch´-ī-cŭs havi eg sent til Ē´-phē-sūs.

13 Kápuna, sum eg eftirlæt í Trō´-ās hjá Carpusi, tá ið tú kemurt, hav *við tær,* og bøkurnar, *men* serliga skinnbøkurnar.

14 Alexander koparsmiður gjørdi mær nógv ilt: Harrin endurgjaldi honum samsvarandi við verkˇ hansara:

15 Fyri hvørjum[P] vert tú varin eisini; tí at hann hevur stórligani staðið ímóti orðum okkara.

16 Við mítt fyrsta *rættar*svar stóð eingin maður hjá mær, men allir *menn* yvirgóvu meg: *eg biði Guð,* at tað má ikki verða lagt til teirra rokning.

17 Hóast hetta, Harrin stóð hjá mær, og styrkti meg; at viðˆ mær prædikanin mátti verða til fulnar kend, og *at* allir Heidningarnir máttu hoyra: og eg varð útfríaður út úr munni leyvunnar.

18 Og Harrin skal útfría meg frá hvørjum illum verki, og vil varðveita *meg* at himinska kongadømi sínum: til hvørs *veri* dýrd um ævir og ævir. Ā´-mĕn.

19 Heilsa Priscu og Ă-quī´-lăs-i, og húshaldi Ô-nēs-ī-phō´-rŭs-ar.

20 Ê-răs´-tūs varð verandi í Corinth: men Trō´-phī-mŭs havi eg eftirlatið í Mī-lē´-tūm sjúkan.

21 Ger títt ídni at koma fyri vetur. Ēv´-bū-lŭs letur heilsa tær, og Pū´-dēns, og Lī´-nŭs, og Claudia, og allir brøðurnir.

22 Harrin Jesus Christus *veri* við anda tínum. Náði *veri* við tykkum. Ā´-mĕn.

¶ Hin seinni *epistilin* til Timotheusar, innsettur hin fyrsti biskupurin í kirkju Ê-phēs´-aranna, varð skrivaður frá Róm, tá ið Paulus varð førdur framfyri Nero aðru ferðina.

EPISTIL PAULUSAR TIL TITUSAR.

KAPITUL 1

PAULUS, ein tænari Guðs, og ein ápostul Jesu Christs, samsvarandi við trúnna hjá Guðs útvaldu, og viðurkenningina av sannleikanum, sum er eftir gudiligleika;

2 Í vón um ævigt lív, sum Guð, sum kann ikki lúgva, fyrijáttaði áður enn verøldin byrjaði;

3 Men hevur í sínum tíðum eyðsýnt sítt orð ígjøgnum prædikan, sum mær er litin til samsvarandi við boð Guðs Frelsara várs;

4 Til Titusar, *míns* egna sonar eftir hini felags trúgv: Náði, miskunn, *og* friður, frá Guði Faðirinum og Harranum Jesusi Christi Frelsara várum.

5 Fyri hesa grund læt eg teg eftir á Cretoy, at tú skuldirt seta í rættlag teir lutir sum vanta í, og innseta elstar í hvørjum staði, eins og eg hevði fyriskipað tær:

6 Um nakar veri ólastandi, ektamaðurin hjá ēinari ektakonu, havandi trúføst børn — ikki ákærd fyri óryggjuskap ella óstýrlig.

7 Tí at ein biskupur má vera

ólastandi, sum umsjónarmaður Guðs; ikki sjálvráðin, ikki skjótt firtin, ikki givin til vín, eingin sláari, ikki givin til skitnan vinning;
8 Men ein elskari av gestablídni, ein elskari av góðum monnum, edrúiligur, rættvísur, heilagur, fráhaldandi;
9 Haldandi fast hitt trúfasta orðið, *so* sum hann er vorðin lærdur, at hann má vera førur fyri, viðˆ heilnæmari Guðslæru, bæði at áminna og at sannføra andmælararnar.
10 Tí at tað eru mangir óstýrligir og fáfongdir tosarar og villleiðarar, serliga teir av umskeringini:
11 Hvørs munnar mugu verða teptir, sum endavenda heil hús; frálærandi lutir sum teir áttu ikki, fyri skitnan vinnings skyld.
12 Ein av teimum, *enntá* ein prophetur av teirra egnu, segði, Cretoyingarnir *eru* alvegis lygnarar, ónd beist, seinir búkar.
13 Hesin vitnisburður er sannur. Hvørsvegna harta teir hvassliga, at teir mega verða heilnæmir í trúnni;
14 Ei gevandi gætur eftir Jødiskum fáblum, og boðum av monnum, sum venda frá sannleikanum.
15 Hjá teimum reinu, allir lutir *eru* reinir: men teimum, sum eru dálkaðir og vantrúgvandi, *er* einkið reint; men sjálvt teirra hugur og samvitska er dálkað.
16 Teir vátta, at teir kenna Guð; men í verkum teir avnokta *hann,* verandi andstyggiligir, og ólýdnir, og at hvørjum góðum verki afturrekingar.

KAPITUL 2

MEN tala tú teir lutir sum søma heilnæmari Guðslæru:
2 At hinir aldraðu menn veri edrúiligir, virðiligir, fráhaldandi, heilnæmir í trúgv, í vælvild, í tolmóði.
3 Hinar aldraðu kvinnur líkaleiðis, at *tær veri* í atferð *so* sum sømir heilagleika, ikki falskir ákærarar, ikki givnar til nógv vín, frálærarar av góðum lutum;
4 At tær mega læra hinar ungu kvinnur at vera edrú*ilig*ar, at elska ektamenn sínar, at elska børn síni,
5 *At vera* hóvsamar, kýskar, passarar við hús, góðar, lýdnar fyri sínum egnu ektamonnum, at Guðs orð verði ikki Guðsspottað.
6 Ungar menn somuleiðis formana at vera edrúiliga sinnaðar.
7 Í øllum lutum sýnandi teg sjálvan eitt mynstur um góð verk: í Guðslæru *sýnandi* óspiltleika, sómasemi, ærligleika,
8 Heilnæma talu, sum kann ei verða fordømd; at hann, sum er av tí mótsatta partinum, má skammast, havandi einkið ilt at siga um tykkum.
9 *Formana* tænarar at vera lýdnar yvirfyri sínum egnu meistarum, *og* at toknast *teim* væl í øllum *lutum;* ei svarandi aftur;
10 Ei dríggjandi, men sýnandi allan góðan trúskap; at teir mega prýða Guðslæru Guðs Frelsara várs í øllum lutum.
11 Tí at Guðs náði, sum viðførir frelsu, er birt fyri øllum monnum,
12 Lærandi okkum, at, avnoktandi ógudiligleika og veraldligar lystir, vit skuldu liva edrúiliga, rættvísiliga, og gudiliga, í hesi núverandi verøld;
13 Væntandi eftir hini sælu vón, og hini dýrdmiklu birting hins mikla Guðs og Frelsara várs Jesu Christs;
14 Sum gav seg sjálvan fyri okkum, at hann mátti endurloysa okkum frá allari misgerð, og reinsa sær sjálvum eitt seregið fólk, vandlætið um góð verk.
15 Hesi ting tala, og formana, og harta við øllum myndugleika. Lat ongan mann vanvirða teg.

KAPITUL 3

LEGG teimum í huga at vera undirgivnar fyri fúrstadømum og máttum, at lýða stýrismenn, at vera fúsir til hvørt gott verk,

2 At tala ilt um ongan mann, at vera eingir ófriðarkroppar, *men* mildir, sýnandi alla spakføri at øllum monnum.

3 Tí at vit sjálvir eisini vóru ēinaferð fávitskutir, ólýdnir, villleiddir, tænandi ymsum girndum og njótingum, livandi í illvilja og øvund, hatursfullir, *og* hatandi hvør annan.

4 Men eftir at góðska og kærleiki Guðs Frelsara várs mótvegis monn*um* birtist,

5 Ikki av rættvísisverkum sum vit hava gjørt, men samsvarandi við sína miskunn hann frelsti okkum, við^ tváingini av endurføðing, og endurnýggjan av Halga Andanum;

6 Sum hann úthelti á okkum ríkiligani gjøgnum Jesus Christ Frelsara váran;

7 *Fyri* at, verandi rættvísgjørdir við^ náði hansara, vit skuldu verða gjørdir *til* arvingar samsvarandi við vónina um ævigt lív.

8 *Hetta er* ein trúføst framsøgn, og hesi ting vil eg at tú staðfesti støðugliga, at teir, sum hava trúð á Guð, máttu vera vandnir um at halda uppi góð verk. Hesi ting eru góð og monnum gagnlig.

9 Men skýggja fávitskutar spurningar, og ættartøl, og trætur, og stríðingar um lógina; tí at tey eru ógagnlig og fáfongd.

10 Ein mann, sum er ein ranglærari, eftir hina fyrstu og aðru ávaring avvís;

11 Vitandi, at hann, sum er slíkur, er rangvørgur, og syndar, verandi dómfeldur av sær sjálvum.

12 Tá ið eg skal senda Artemas til tín, ella Tȳch-ī-cŭs, ver íðin at koma til mín til Nī-cō-pō-līs: tí at eg havi avrátt har at vetra.

13 Før løgfrøðingin Zē-nās og Ă-pŏl-lōs á teirra ferð ídnisligani, at einkið verði vantandi teimum.

14 Og lat okkara eisini læra at halda uppi góð verk fyri neyðugar nýtslur, at teir veri ikki ófruktsamir.

15 Allir, sum eru hjá mær, lata heilsa tær. Heilsa teimum sum elska okkum í trúnni. Náði *veri* við tykkum øllum. Á-mēn.

¶ Hann varð skrivaður til Titusar, innsettur hin fyrsti biskupur hjá kirkju Cretoyinganna, frá Nī-cō-pō-līs í Măc-ĕ-dō-nī-ŭ.

EPISTIL PAULUSAR TIL PHILEMONS.

PAULUS, ein fangi Jesu Christs, og Timotheus, bróðir *okkara,* til Phī-lē-mŏn-s, okkara kærliga elskaða, og arbeiðsfelaga,

2 Og til *okkara* háttelskaðu Ăpphī-ī-ŭ, og Âr-chĭp-pŭs-ar, hermannafelaga okkara, og til kirkjuna í húsi tínum:

3 Náði til tykkara, og friður, frá Guði Faðir várum og Harranum Jesusi Christi.

4 Eg takki Guði mínum, nevnandi teg altíð í bønum mínum,

5 Hoyrandi um tín kærleika og trúgv, sum tú hevurt mótvegis Harranum Jesusi, og mótvegis øllum heilagum;

6 At samfelag trúar tínar má gerast árinssamt við viðurkenningini av hvørjum góðum tingi sum er í tykkum í Christi Jesusi.

7 Tí at vit hava mikla gleði og

troyst í kærleika tínum, av tí at innangoymslur teirra heilagu eru endurfrískaðar við^ tær, bróðir.
8 Hvørsvegna, hóast eg kundi verið mikið djarvur í Christi at álagt tær tað sum er hentugt,
9 Tó fyri kærleikans skyld heldur bøni eg *teg,* verandi ein slíkur sum Paulus hin aldraði, og nú eisini ein fangi Jesu Christs.
10 Eg bøni teg fyri son mín Ò-nēs´-ĭ-mŭs, hvønn eg havi gitið í bondum mínum:
11 Sum í farnari tíð var fyri tær ógagnligur, men nú gagnligur hjá tær og hjá mær:
12 Hvønn eg havi sent aftur: tú tessvegna tak ímóti honum, tað er, mínum egnu innangoymslum:
13 Hvønn eg vildi havt hildið aftur hjá mær, at í plássi tínum hann mátti havt tænt mær í bondum gleðiboðskaparins:
14 Men uttan tín hug vildi eg einkið gera; at tín góðgerð skuldi ikki vera sum var tað av neyðsyn, men viljugliga.
15 Tí at møguliga fór hann tessvegna burtur í eina tíð, at tú skuldirt móttaka hann um ævir;
16 Ikki nú sum ein tænara, men omanfyri ein tænara, ein bróður háttelskaðan, serliga hjá mær, men hvør mikið meira tær, bæði í kjøtinum, og í Harranum?
17 Um tú rokni meg tí ein lagsmann, tak ímóti honum sum mær sjálvum.
18 Um hann havi órættað teg, ella skyldar *tær* okkurt, set tað á mína rokning;
19 Eg, Paulus, havi skrivað *tað* við míni egnu hond, eg vil endurgjalda *tað:* veri alt so, eg sigi ikki við teg hvussu tú skyldart mær sjálvt teg sjálvan umframt.
20 Ja, bróðir, lat meg hava frøi av tær í Harranum: endurfríska mínar innangoymslur í Harranum.
21 Havandi álit á títt lýdni, skrivaði eg tær, vitandi at tú vilt eisini gera meir enn eg sigi.
22 Men afturat øllum, fyrireika mær eisini eitt tilhald: tí at eg líti á, at gjøgnum tykkara bønir, eg skal verða givin tykkum.
23 Tað lata heilsa tær Ēp´-ă-phrăs, samfangi mín í Christi Jesusi;
24 Marcus, Âr-ĭs´-târ-chŭs, Dē´-măs, Lucas, arbeiðsfelagar mínir.
25 Náði várs Harra Jesu Christs *veri* við anda tykkara. Á´-mĕn.

¶ Skrivaður frá Róm til Phĭ´-lē-mŏn-s av Ò-nēs´-ĭ-mŭs-i, einum tænara.

EPISTIL PAULUSAR ÁPOSTULS TIL HEBREARANNA.

KAPITUL 1

GUÐ, sum til ymsar tíðir og á mangar hættir talaði í farnari tíð til fedranna við prophetunum,
2 Hevur í hesum síðstu døgum talað til okkara við^ Syni *sínum,* hvønn hann skipað hevur arvinga til øll ting, við^ hvørjum^p eisini hann gjørdi verøldirnar;
3 Hvør, verandi bjartleikin av dýrd *hansara,* og úttrykkiliga myndin av persóni hansara, og haldandi uppi øllum tingum við^ orði kraftar sínar, tá ið hann við^ sær sjálvum hevði reinskað okkara syndir, settist niður við høgru hond Hátignarinnar á hæddi*mi;*
4 Verandi gjørdur so mikið mætari enn einglarnir, við tað *at*

hann viðˆ arvi hevur lutast eitt meiri avbært navn enn teir.

5 Tí at við hvønn av einglunum segði hann á nøkrum sinni, Tú ert Sonur mín, henda dag havi eg gitið teg? Og aftur, Eg vil vera fyri honum ein Faðir, og hann skal vera fyri mær ein Sonur?

6 Og aftur, tá ið hann leiðir inn hin frumgitna inn í heimin, sigur hann, Og lat allar Guðs einglar tilbiðja hann.

7 Og um einglarnar sigur hann, Sump ger sínar einglar *til* andar, og sínar tænarar *til* ein loga av eldi.

8 Men við Sonin *sigur hann*, Tín tróna, O Guð, *er* um ævir og ævir: ein veldissproti av rættvísi *er* veldissproti kongadømis tíns.

9 Tú hevurt elskað rættvísi, og hatað misgerð; tí hevur Guð, *enntá* tín Guð, teg salvað við gleðisoljuni uppum tínar felagar.

10 Og, Tú, Harri, í byrjanini hevurt lagt grundvøll jarðarinnar; og himnarnir eru verkini av hondum tínum:

11 Teir skulu ganga undir; men tú verðurt verandi; og teir allir skulu gerast gamlir sum ger eitt klæði;

12 Og sum ein kappa skalt tú balla teir saman, og teir skulu verða umskiftir: men tú ert hin sami, og tíni ár skulu ikki víkja.

13 Men til hvørs av einglunum segði hann á nøkrum sinni, Sit við høgru hond mína, inntil eg geri tínar figgindar *til* fótskammul tín?

14 Eru teir ikki allir tænandi andar, sendir fram at tæna fyri teir sum skulu verða arvingar til frelsu?

KAPITUL 2

TÍ áttu vit at geva tess meira gjølla gætur eftir teim tingunum sum vit hava hoyrt, at ikki á nøkrum sinni vit skuldu latið *tey* gloppið.

2 Tí at um orðið, talað við einglum, var støðufast, og hvørt misbrot og ólýðni fekk eitt rættvíst lønar-endurgjald;

3 Hvussu skulu vit sleppa undan, um vit vansketta so mikla frelsu; sum í fyrstani byrjaði at verða talað av Harranum, og varð staðfest okkum av teimum sum hoyrdu *hann;*

4 Guð eisini berandi *teim* vitnisburð, bæði við teknum og undrum, og við ymsum kraftarverkum, og gávum Halga Andans, samsvarandi við sín egna vilja?

5 Tí at einglunum hevur hann ikki lagt í undirlagni heimin sum koma skal, um hvønn vit tala.

6 Men ēin, á einum ávísum staði, vitnaði, sigandi, Hvat er maður, at tær kemur hann til hugs? ella menniskjusonurin, at tú vitjart hann?

7 Tú gjørdirt hann lítið lægri enn einglarnar; tú krýndirt hann við dýrd og æru, og settirt hann yvir verkum handa tína:

8 Tú hevurt lagt allar lutir í undirlagni undir føtur hansara. Tí at við tað at hann legði alt í undirlagni undir hann, eftirlæt hann einkið *sum er* ikki lagt undir hann. Men nú siggja vit ikki enn allar lutir lagdar undir hann.

9 Men vit siggja Jesus, sum varð gjørdur lítið lægri enn einglarnir fyri líðing deyðans, krýndan við dýrd og æru; at hann viðˆ Guðs náði skuldi smakka deyða fyri hvønn mann.

10 Tí at tað sømdi honum, fyri hvønn *eru* øll ting, og viðˆ hvørjum *eru* øll ting, í at føra mangar synir til dýrdar, at gera upphavsmannin til teirra frelsu fullkomnan ígjøgnum líðingar.

11 Tí at bæði hann sum halgar, og teir sum verða halgaðir, *eru* allir av ēinum: fyri hvørja grund hann ikki skammast at kalla teir brøður,

12 Sigandi, Eg vil kunngera navn títt brøðrum mínum, í miðjari kirkjuni vil eg syngja tær prís.

13 Og aftur, Eg vil seta mítt álit á hann. Og aftur, Sí, eg og tey børn sum Guð hevur givið mær.
14 Við tað tá at børnini eru luttakarar í kjøti og blóði, sjálvur hann eisini somuleiðis tók lut í tí sama; at, gjøgnum deyða, hann mátti oyðileggja hann sum hevði mátt deyðans, tað er, djevulin;
15 Og útfría teir, sum gjøgnum ræðslu fyri deyða vóru alla sína lívstíð undirlagdir fyri trældómi.
16 Tí at sanniliga tók hann ikki á *seg náttúru* eingla; men hann tók á *seg* sáð Abrahams.
17 Hvørsvegna tað í øllum tingum tørvaði honum at verða gjørdur líkur brøðrum *sínum,* at hann mátti vera ein miskunnarfullur og trúfastur høvuðsprestur í tingum *sum hoyra til* Guðs, at gera endursóning fyri syndir fólksins.
18 Tí at við tað at sjálvur hann hevur liðið, verðandi freistaður, er hann førur fyri at vera til hjálpar teimum sum verða freistaðir.

KAPITUL 3

HVØRSVEGNA, heilagu brøður, luttakarar í himinsku kallanini, umhugsið Apostulin og Høvuðsprestin av okkara játtan, Christ Jesus;
2 Sum var trúfastur móti honum sum skipaði hann, eins og eisini Móses *var trúfastur* í øllum húsi hansara.
3 Tí at hesin *maðurin* varð taldur verdur til meiri dýrd enn Móses, so mikið sum hann, sum bygt hevur húsið, hevur meiri heiður enn húsið.
4 Tí at hvørt hús verður bygt av onkrum *manni;* men hann, sum øll ting bygdi, *er* Guð.
5 Og Móses sanniliga *var* trúfastur í øllum húsi hansara, sum ein tænari, til ein vitnisburð um tey tingini sum vórðu at verða talað aftaná;
6 Men Christus sum sonur yvir egna húsi hansara; hvørs hús vit eru, um vit haldi fast treystið og fagnaðin av vónini óvikaðum *fram*at endanum.
7 Hvørsvegna, (eins og Halgi Andin sigur, Í dag, um tit vilji hoyra rødd hansara,
8 Herðið ikki hjørtu tykkara, sum í tirringini, á freistingardeginum í oyðimørkini:
9 Tá ið tykkara fedrar freistaðu meg, royndu meg, og sóu verkini hjá mær *í* fjøruti ár.
10 Hvørsvegna eg varð harmur við ta ætt, og segði, Teir alvegis fara skeivir í hjørtum *sínum;* og teir hava ikki kent mínar vegir.
11 So eg svór í míni vreiði, Teir skulu ikki ganga inn til hvíld mína.)
12 Gevið gætur, brøður, at ikki tað veri í nøkrum av tykkum eitt vont vantrúarhjarta, í at víkja frá hinum livandi Guði.
13 Men formanið hvør annan dagligani, meðan tað eitur Í dag; at ikki nakar av tykkum verði herðaður gjøgnum svikafullsemi syndarinnar.
14 Tí at vit eru gjørdir luttakarar í Christi, um vit haldi byrjanina av okkara treysti støðufast *fram*at endanum;
15 Meðan tað verður sagt, Í dag, um tit vilji hoyra rødd hansara, herðið ikki hjørtu tykkara, sum í tirringini.
16 Tí at summir, tá ið teir høvdu hoyrt, tirraðu: hvussu enn er ikki allir sum komu út úr Egyptalandi við Mósesi.
17 Men við hvørjar varð hann harmur *í* fjøruti ár? *var tað* ikki við teir sum høvdu syndað, hvørs ræ fullu í oyðimørkini?
18 Og til hvørja svór hann, at teir skuldu ikki ganga inn til hvíld hansara, uttan til teirra sum trúðu ikki?
19 So vit síggja, at teir kundu ikki ganga inn vegna vantrúgv.

KAPITUL 4

LATUM okkum tí óttast, at ikki, ein fyrijáttan verandi eftirlatin *okkum* um at ganga inn til hvíld hansara, nakar av tykkum skuldi tóktst at koma til kort av tí.

2 Tí at okkum varð gleðiboðskapurin prædikaður, eins væl sum teimum: men orðið, *sum varð* prædikað, gagnaði teimum ikki, ei verðandi blandað við trúgv í teimum sum hoyrdu *tað*.

3 Tí at vit, sum hava trúð, ganga inn til hvíld, eins og hann segði, Sum eg havi svorið í míni vreiði, um teir skulu ganga inn til hvíld mína: hóast verkini vóru fullgjørd frá grundlegging veraldarinnar.

4 Tí at hann talaði á einum ávísum staði um hin sjeynda *dag* á hesa vís, Og Guð hvíldi hin sjeynda dagin frá øllum verkum sínum.

5 Og á hesum *staði* aftur, Um teir skulu ganga inn til hvíld mína.

6 Við tað, tessvegna, at tað stendur eftir, at summir eiga at ganga harinn, og teir, fyri hvørjum tað varð fyrst prædikað, gingu ikki inn uppá grund av vantrúgv:

7 Avmarkar hann aftur ein dag, sigandi hjá Dávidi, Í dag, eftir so langa tíð; eins og tað er sagt, Í dag, um tit vilji hoyra rødd hansara, herðið ikki hjørtu tykkara.

8 Tí at um Jesus hevði givið teimum hvíld, tá vildi hann ikki aftaná havt talað um ein annan dag.

9 Tað stendur eftir, tessvegna, ein hvíld hjá fólki Guðs.

10 Tí at hann, sum er gingin inn til hvíld hansara, hann eisini er hildin uppat frá sínum egnu verkum, eins og Guð *gjørdi* frá sínum.

11 Latum okkum streva, tessvegna, *eftir* at ganga inn í ta hvíldina, at ikki nakar maður falli eftir hinum sama vantrúar fyridømi.

12 Tí at orð Guðs *er* livandi, og máttmikið, og hvassari enn nakað tvíeggjað svørð, gatandi enntá til skiljingina sundur av sál og anda, og av liðunum og mergi, og *er* ein greinari av hugsanum og ráðum hjartans.

13 Eiheldur er nakar skapningur sum er ikki eyðsýndur fyri eygsjón hansara: men allir lutir *eru* naknir og upplatnir eygum hansara, við hvønn vit hava at gera.

14 Við tað tá at vit hava ein miklan høvuðsprest, sum er umfarin inn í himnarnar, Jesus Son Guðs, latum okkum halda fast *okkara* játting.

15 Tí at vit hava ikki ein høvuðsprest, sum kann ikki verða nortin við kensluni av okkara veikleikum; men varð í øllum punktum freistaður líka sum *vit verða, tó* uttan synd.

16 Latum okkum tí koma djarvligani at hásæti náðinnar, at vit mega vinna miskunn, og finna náði til hjálpar í tíð av tørvi.

KAPITUL 5

TÍ at hvør *ein* høvuðsprestur, tikin burturúr manna*flokki,* verður innsettur fyri menn í tingum *sum hoyra* til Guðs, at hann má ofra bæði gávur og sláturoffur˘ fyri syndir:

2 Hvør hava kann várkunn við hinum óvitandi, og við teimum sum eru úti av veginum; av tí at sjálvur hann eisini er umgivin við veikleika.

3 Og uppá grund av hesum átti hann, eins og fyri fólkið, soleiðis eisini fyri seg sjálvan, at ofra fyri syndir.

4 Og eingin maður tekur sær sjálvum henda heiður, men hann sum er kallaður av Guði, eins og Aaron *varð*.

5 Soleiðis eisini dýrðmetti ikki Christus seg sjálvan at verða gjørdur høvuðsprestur; men hann sum segði við hann, Tú ert Sonur mín, í dag havi eg gitið teg.

6 Eins og hann sigur eisini á einum øðrum *staði,* Tú *ert* prestur um ævir eftir skipan Mël-chĭ´-sê-dĕc-s.

7 Hvør á døgum kjøts síns, tá ið hann hevði ofrað upp bønir og áheitanir við sterkum gráti og tárum til hansara sum var førur fyri at bjarga honum frá deyða, og varð hoyrdur í at hann óttaðist;

8 Tó *at* hann var Sonur, tó lærdi hann lýdni av teim tingum sum hann leið;

9 Og, verandi gjørdur fullkomin, gjørdist hann upphavsmaðurin at ævigari frelsu hjá øllum teimum sum lýða hann;

10 Kallaður av Guði ein høvuðsprestur eftir skipan Mël-chĭ´-sê-dĕc-s.

11 Um hvønn vit hava mong ting at siga, og ring at verða mæld, við tað at tit eru dulir av hoyrn.

12 Tí at tá ið, eftir tíðini, tit áttu at verið frálærarar, hava tit tørv *á* at ēin læri tykkum aftur hvørjar *veri seg* hinar fyrstu grundreglur orakla Guðs; og eru vorðnir slíkir sum hava tørv á mjólk, og ikki á sterkum mati.

13 Tí at hvør tann, sum brúkar mjólk, *er* óhegnigur í rættvísisorðinum: tí at hann er pinkubarn.

14 Men sterkur matur hoyrir til teirra sum eru við fullan aldur, *enntá* teirra sum uppá grund av brúki hava sínar sansir vandar til at greina bæði gott og ilt.

KAPITUL 6

TESSVEGNA, farandi frá byrjanarsetningunum av Guðslæru Christs, latum okkum fara víðari *fram*at fullkominleika; ei leggjandi aftur grundvøllin av umvending frá deyðum verkum, og av trúgv mótvegis Guði,

2 Av Guðslæruni um dópar, og um handaálegging, og um uppreisn av teimum deyðu, og um ævigan dóm.

3 Og hetta vilja vit gera, um Guð loyvi.

4 Tí at *tað er* ómøguligt hjá teimum sum vórðu ēinaferð upplýstir, og hava smakkað av hini himinsku gávu, og vórðu gjørdir luttakarar í Halga Andanum,

5 Og hava smakkað hitt góða orð Guðs, og krefturnar av hini komandi verøld,

6 Um teir skulu falla frá, at endurnýggja teir aftur til umvendingar; við tað at teir krossfesta fyri sær sjálvum Son Guðs av nýggjum, og seta *hann* til opna skomm.

7 Tí at jørðin, sum drekkur inn regnið sum ofta kemur uppá hana, og ber fram urtir, hóskiligar fyri teir, av hvørjum hon verður dyrkað, fær signing frá Guði:

8 Men tað, sum ber tornir og tistlar, *er* vrakað, og *er* banning nær; hvørs endi *er* at verða brent.

9 Men, háttelskaðu, vit eru sannførdir *um* betri ting˘ um tykkum, og ting˘ sum fylgja við frelsu, tó *at* vit soleiðis tala.

10 Tí at Guð *er* ikki órættvísur at gloyma tykkara verk og kærleiks arbeiði, sum tit hava sýnt mótvegis navni hansara, í at tit hava tænt mót*vegis* teimum heilagu, og tæna.

11 Og vit tráa, at hvør *og* ēin av tykkum sýni hitt sama ídni til hinnar fullu vónar-vissu *fram*at endanum:

12 At tit verði ikki latir, men *eftir*fylgjarar av teim sum gjøgnum trúgv og tolmóð arva fyrijáttanirnar.

13 Tí at tá ið Guð gjørdi fyrijáttan til Ábrahams, av tí at hann kundi ongan størri svørja við˘, svór hann við˘ seg sjálvan,

14 Sigandi, Vissuliga, vælsignandi vil eg vælsigna teg, og margfaldandi vil eg margfalda teg.

15 Og so, eftir *at* hann hevði tolmóðigani hildið út, vann hann fyrijáttanina.

16 Tí at menn sanniliga svørja við hin miklara: og ein eiður til staðfestingar *er* fyri teimum ein endi á øllum stríði.
17 Í hvørjum Guð, villigur meiri ríkiligani at sýna fyrijáttanar-arvingunum óbrigdiligsemina av sínum ráði, staðfesti *tað* við einum eiði:
18 At við^ tveimum óbrigdiligum tingum, í hvørjum *tað var* ómøguligt hjá Guði at lúgva, vit máttu hava eina sterka troystan, sum hava flýggjað í skjól *fyri* at leggja hald uppá vónina, sett frammanfyri okkum:
19 Hvørja *vón* vit hava sum eitt akker sálarinnar, bæði trygt og støðufast, og sum innfer inn í tað fyri innan forhangið;
20 Hvagar fyrirennarin er fyri oss innfarin, *enntá* Jesus, gjørdur høvuðsprestur um ævir eftir skipan Mël-chī´-sê-dëc-s.

KAPITUL 7

TÍ at hesin Mël-chī´-sê-dëc, kongur Sā´-lëm-s, prestur hins hægsta Guðs, hvør møtti Ábrahami – komandi aftur frá slátringini av kongunum, og vælsignaði hann;
2 Til hvørs eisini Ábraham gav ein tíggjundarpart av øllum; fyrst verandi, við týðing, Kongur rættvísis, og eftir tað eisini Kongur Sā´-lëm-s, sum er, Friðar Kongur;
3 Uttan faðir, uttan móður, uttan ætt, havandi hvørki byrjan av døgum, ella enda av lívi; men gjørdur líkur Syni Guðs; verður *verandi* prestur áframhaldandi.
4 Nú, umhugsið hvussu mikil hesin maður *var,* hvørjum sjálvt ættarfaðirin Ábraham gav tíggjundina av herfongunum.
5 Og sanniliga teir, sum eru av sonum Levīs, sum taka ímóti embæti prestadømisins, hava eitt boð *um* at taka tíggjundir av fólkinum samsvarandi við lógina, tað er, av brøðrum sínum, tó *at* teir komi úr lendum Ábrahams:
6 Men hann, hvørs ætt er ikki tald frá teimum, móttók tíggjundir av Ábrahami, og vælsignaði hann sum hevði fyrijáttanirnar.
7 Og uttan alla andmæling, *so* verður hitt ringara vælsignað av tí mætara.
8 Og her móttaka menn, sum doyggja, tíggjundir; men har *móttekur* hann *tær,* um hvønn tað er vitnað, at hann livir.
9 Og sum eg kann so siga, Levī eisini, sum móttekur tíggjundir, galt tíggjundir í Ábrahami.
10 Tí at hann var enn í lendum faðirs síns, tá ið Mël-chī´-sê-dëc møtti honum.
11 Um tí fullkominleiki var við^ tí Lē-vīt´-ĭsk-ă prestadøminum, (tí at undir tí móttók fólkið lógina,) hvør viðari tørvur *var á,* at ein annar prestur skuldi rísa eftir skipan Mël-chī´-sê-dëc-s, og ikki verða kallaður eftir skipan Aarons?
12 Tí at prestadømið, verðandi broytt, verður tað av neyðsyn eisini gjørd ein broyting á lógini.
13 Tí at hann, um hvønn hesi ting verða talað, hoyrir til eina aðra ættargrein, av hvørji eingin maður veitti vartan við altarið.
14 Tí at *tað er* eyðsýnt, at Harri okkara rann út úr Juda; um hvørja ættargrein Móses talaði einkið viðvíkjandi prestadømi.
15 Og tað er enn nógv meira eyðsýnt: tí at eftir líkleika Mël-chī´-sê-dëc-s stígur upp ein annar prestur,
16 Hvør gjørdur er, ikki eftir lógini av einum kjøtligum boði, men eftir kraftini av einum endaleysum lívi.
17 Tí at hann vitnar, Tú *ert* ein prestur um ævir eftir skipan Mël-chī´-sê-dëc-s.
18 Tí at tað er sanniliga ein avtøka av boðinum, farandi undan, fyri veikleika og ógagnsemi tess.

19 Tí at lógin gjørdi einkið fullkomið, men føringin inn av eini betri vón *gjørdi;* við hvørji vit nærkast Guði.

20 Og eftirsum at ikki uttan eið *varð hann gjørdur prestur:*

21 (Tí at teir prestarnir vórðu gjørdir uttan eið; men hesin við einum eiði av honum sum segði við hann, Harrin svór og vil ikki iðrast, Tú *ert* prestur um ævir eftir skipan Mël-chī´-sê-dĕc-s:)

22 Við so miklum varð Jesus gjørdur borgan um eitt betri testamenti.

23 Og teir sanniliga vóru mangir prestar, av tí at teim varð ikki loyvt at halda áfram uppá grund av deyða:

24 Men hesin *maður,* av tí at hann heldur áfram ævir, hevur eitt óbroytiligt prestadømi.

25 Hvørsvegna hann er førur fyri eisini at frelsa teir til hins ytsta, sum koma til Guðs við honum, við tað at hann ævir livir til at ganga í forbøn fyri teimum.

26 Tí ein slíkur høvuðsprestur sámaði okkum, *sum er* heilagur, meinaleysur, ódálkaður, atskildur frá syndarum, og gjørdur hægri enn himnarnir;

27 Hvør tørvast ikki dagliga, eins og teir høvuðsprestarnir, at ofra upp sláturoffur, fyrst fyri sínar egnu syndir, og síðan fyri fólksins: tí at hetta hann gjørdi ēinaferð, tá ið hann ofraði upp seg sjálvan.

28 Tí at lógin ger menn *til* høvuðsprestar sum hava veikleika; men orðið av tí eiðinum, sum var síðan lógina, *ger* Sonin, sum er innvígaður um ævirmeir.

KAPITUL 8

NÚ, av teimum tingunum, sum vit hava talað, *er* samløgan *hendan:* Vit hava ein slíkan høvuðsprest, sum er setstur við høgru hond hásætis Hátignarinnar í himnunum;

2 Ein tænara halgidómsins, og av tí sanna tabernaklinum, sum Harrin uppsló, og ikki maður.

3 Tí at hvør *ein* høvuðsprestur verður innsettur til at ofra gávur og sláturoffur: hvørsvegna *tað er* av neyðsyn, at hesin maður havi eitthvørt eisini at ofra.

4 Tí at um hann var á jørð, skuldi hann ei verið prestur, við tað at har eru prestar sum ofra gávur samsvarandi við lógina:

5 Sum tæna at fyridøminum og skugganum av himinskum tingum, eins og Móses varð varaður við av Guði, tá ið hann var um at gera tabernaklið: tí at, Síggj *til,* sigur hann, *at* tú geri øll ting samsvarandi við mynstrið, sýnt fyri tær á fjallinum.

6 Men nú hevur honum lutast ein meiri framúrskarandi tænasta, við hvussu miklum hann eisini er millumgongumaðurin av einum betri sáttmála, sum varð grundaður uppá betri fyrijáttanir.

7 Tí at um hasin fyrsti *sáttmálin* hevði verið feilafríur, tá skuldi einkið pláss havt verið søkt fyri hinum øðrum.

8 Tí at, finnandi feil við teimum, sigur hann, Sí, teir dagar koma, sigur Harrin, tá ið eg vil gera ein nýggjan sáttmála við Ísraels hús og við Judah hús:

9 Ikki samsvarandi við sáttmálan, sum eg gjørdi við teirra fedrar á tí degi, tá ið eg tók í hondina á teimum at leiða teir út úr Egyptalandi; av tí at teir hildu ikki áfram í sáttmála mínum, og eg gav teimum ikki gætur, sigur Harrin.

10 Tí at hesin *er* sáttmálin, sum eg vil gera við Ísraels hús eftir teir dagarnar, sigur Harrin; eg vil leggja mínar lógir inn í huga teirra, og skriva tær í hjørtu teirra: og eg vil vera fyri teimum ein Guð, og teir skulu vera fyri mær eitt fólk:

11 Og teir skulu ikki læra hvør maður næsta sín, og hvør maður

bróður sín, sigandi, Kenn Harran: tí at allir skulu kenna meg, frá tí minsta til hin størsta.

12 Tí at eg vil vera miskunnarfullur móti órættvísi teirra, og teirra syndir og teirra misgerðir vil eg minnast ei meira.

13 Í tí at hann sigur, Ein nýggjan *sáttmála,* hevur hann gjørt hin fyrsta gamlan. Nú tað, sum forferst og gerst gamalt, *er* tilreiðar at hvørva burtur.

KAPITUL 9

TÁ sanniliga hevði hin fyrsti *sáttmálin* eisini fyriskipanir um guddómliga tænastu, og ein veraldligan halgidóm.

2 Tí at har varð eitt tabernakkul gjørt; hitt fyrsta, hvarí *var* kertastakin, og borðið, og sýnisbreyðini; sum verður kallað halgidómurin.

3 Og eftir hitt annað forhangið, tabernaklið, sum verður kallað hitt alra Heilagasta;

4 Sum hevði hitt gylta roykilsisaltarið, og sáttmálaørkina yvirlagda runt umkring við gulli, hvarí *var* hin gylta krukkan sum hevði măn´-nă, og stavur Aarons sum blómaði, og talvur sáttmálans;

5 Og yvir tí dýrdar-chêr-ûb´-arnar, skuggandi náðistólin; um hvørt vit kunnu ikki nú tala hvørt sær.

6 Nú, tá ið hesi tingini vórðu soleiðis fyriskipaði, fóru prestarnir altíð inn í hitt fyrsta tabernaklið, fullførandi *Guðs*-tænastuna.

7 Men inn í hitt annað *fór* høvuðspresturin einsamallur ēinaferð hvørt ár, ikki uttan blóð, sum hann ofraði fyri seg sjálvan, og *fyri* villfaringar fólksins:

8 Halgi Andin hetta uppmálandi, at vegurin inn í hitt alra heilagasta var ikki enn gjørdur eyðsýndur, meðan ið hitt fyrsta tabernaklið enn stóð:

9 Hvørt *var* ein líking um tíðina tá núverandi, í hvørji vórðu ofraðar bæði gávur og sláturoffur˘, sum kundu ikki gera hann, sum gjørdi tænastuna, fullkomnan, hvat samvitskuni viðvíkur;

10 *Sum stóð* einans í matum og drykkjum, og ymsum tváttum, og kjøtligum fyriskipanum, álagdar *teimum* inntil umbótartíðina.

11 Men Christus, verandi komin ein høvuðsprestur av komandi góðum tingum, viðˆ einum miklari og meiri fullkomnum tabernakli, ei gjørdum við hondum, tað vil siga, ikki av hesum bygningi;

12 Eiheldur við blóðinum av geitum og kálvum, men við sínum egna blóði gekk hann inn ēinaferð inn í hitt heilaga staðið, havandi vunnið æviga endurloysing *fyri okkum*.

13 Tí at um blóðið av tarvum og av geitum, og øskurnar av kvígu, áslettandi hinar óreinu, halgar til skírganina av kjøtinum:

14 Hvør mikið meira skal blóð Christs, sum gjøgnum hin æviga Andan ofraði seg sjálvan uttan blett til Guðs, reinska tykkara samvitsku frá deyðum verkum til at tæna hinum livandi Guði?

15 Og fyri hesa grund er hann millumgongumaðurin av hinum nýggja testamenti, at, við brúki av deyða, fyri endurloysingina av misbrotunum *sum vóru* undir hinum fyrsta testamenti, teir, sum eru kallaðir, máttu fáa fyrijáttanina um ævigan arv.

16 Tí at har, *sum* eitt testamenti *er,* har má eisini av neyðsyn verða deyðin av testament-stiftaranum.

17 Tí eitt testamenti *er* við kraft eftir at menn eru deyðir: annars er tað av ongari styrki yvirhøvur, meðan testament-stiftarin livir.

18 Við hvat eiheldur hitt fyrsta *testamenti* varð vígt uttan blóð.

19 Tí at tá ið Móses hevði talað hvørja fyriskipan til alt fólkið samsvarandi við lógina, tók hann blóðið av kálvum og av geitum, við

vatni, og skarlaks ull, og ýsopi, og ásletti bæði bókina, og alt fólkið,
20 Sigandi, Hetta *er* blóðið av testamentinum, sum Guð hevur ásett tykkum.
21 Harafturat ásletti hann við blóði bæði tabernaklið, og øll ker tænastunnar.
22 Og nærum øll ting verða viðˆ lógini reinskað við blóði; og uttan úthelling av blóði er eingin eftirgeving.
23 *Tað var* tí neyðugt, at mynstrini av tingum í himnunum skuldu verða skírgað við hesum; men tey himinsku tingini sjálv við betri sláturofrum enn hesum.
24 Tí at Christus er ikki innfarin inn í hini heilagu stød, gjørd við hondum, *sum eru* avmyndirnar av tí sanna; men inn í himin sjálvan, nú at birtast í nærveru Guðs fyri okkum:
25 Ella tá, at hann skuldi ofrað seg sjálvan ofta, eins og høvuðspresturin innfer inn í tað heilaga plássið hvørt ár við blóðinum av øðrum;
26 Tí at so mátti hann ofta havt liðið síðan grundlegging veraldarinnar: men nú, ēinaferð í enda veraldarinnar, hevur hann birtst til at koyra burtur synd viðˆ sláturofringini av sær sjálvum.
27 Og eins og tað er fyriskipað monnum ēinaferð at doyggja, men eftir hetta *er* dómurin:
28 Soleiðis varð Christus ēinaferð ofraður til at bera syndirnar hjá mongum; og teimum, ið vænta eftir honum, skal hann birtast *fyri* aðru ferð uttan synd til frelsu.

KAPITUL 10

TÍ at lógin, havandi ein skugga av komandi góðum tingum, *og* ikki sjálva myndina á tingunum, kann aldri við teimum sláturofrunum, sum teir ofraðu ár um ár áframhaldandi, gera komararnar at tí fullkomnar.
2 Tí at vildu tey tá ikki havt hildið uppat at verðið ofraði? av tí at tilbiðjararnir, ēinaferð reinskaðir, skuldu einkið meira samvit hava havt um syndir.
3 Men í teimum *sláturofrunum verður tað* ein endurminning aftur *gjørd* um syndir hvørt ár.
4 Tí at *tað er* ikki møguligt, at blóðið av tarvum og av geitum skuldi tikið burtur syndir.
5 Hvørsvegna, tá ið hann kemur inn í heimin, sigur hann, Sláturoffur og offur vildirt tú ei, men eitt likam hevurt tú fyribúgvið mær:
6 Í brenniofrum og *sláturofrum* fyri synd hevurt tú ongan hugnað havt.
7 Tá segði eg, Sí, eg komi, (í bókarrulluni stendur skrivað um meg,) at gera tín vilja, O Guð.
8 Omanfyri, tá ið hann segði, Sláturoffur og offur og brennioffurˇ og *offur* fyri synd vildirt tú ei, eiheldur hevðirt hugnað *hari;* sum verða ofraði viðˆ lógini;
9 Segði hann síðani, Sí, eg komi at gera tín vilja, O Guð. Hann tekur burtur hitt fyrsta, at hann má grundleggja hitt annað.
10 Viðˆ hvørjum vilja vit eru halgaðir gjøgnum ofringina av likami Jesu Christs ēinaferð *fyri allar.*
11 Og hvør *ein* prestur stendur dagliga tænandi og ofrandi ofta hini somu sláturofrini, sum kunnu aldri taka burtur syndir:
12 Men hesin maður, eftir *at* hann hevði ofrað ēitt sláturoffur fyri syndir um ævir, settist niður við høgru hond Guðs;
13 Hiðanífrá eftirvæntandi, til hansara figgindar verði gjørdir *til* hansara fótskammul.
14 Tí at við ēinum ofri hevur hann fullkomingjørt um ævir teir sum eru halgaðir.
15 *Hvarum* Halgi Andin eisini er eitt vitni fyri okkum: tí at eftir at hann áður hevði sagt,

16 Hesin *er* sáttmálin, sum eg vil gera við teir eftir teir dagarnar, sigur Harrin, eg vil leggja mínar lógir inn í hjørtu teirra, og í teirra hugar vil eg skriva tær;
17 Og teirra syndir og misgerðir vil eg minnast ei meira.
18 Nú, har *sum* eftirgeving av hesum *er, har er* ikki longur offur fyri synd.
19 Havandi tessvegna, brøður, dirvi til at ganga inn í hitt heilagasta við Jesu blóði,
20 Við einum nýggjum og livandi vegi, sum hann hevur innvígað fyri okkum, ígjøgnum forhangið, tað vil siga, kjøt hansara;
21 Og, *havandi* ein høvuðsprest yvir húsi Guðs;
22 Latum okkum koma nær við einum sonnum hjarta í fullari trúarvissu, havandi okkara hjørtu ástøkt frá eini óndari samvitsku, og okkara likam tvigið við reinum vatni.
23 Latum okkum halda fast *við* játtingina av *okkara* trúgv, uttan vaklan; (tí at hann *er* trúfastur, sum fyrijáttaði;)
24 Og latum okkum geva gætur hvør eftir øðrum, at eggja til kærleika og góð verk:
25 Ikki yvirgevandi savningina av okkum sjálvum saman, eins og háttarlagið hjá summum *er;* men formanandi *hvør annan:* og tess mikið meira sum tit síggja dagin nærkandi.
26 Tí at um vit synda viljugliga, eftir at vit hava fingið kunnleikan til sannleikan, stendur eftir einkið meira sláturoffur fyri syndir,
27 Men ein ávís ræðulig væntan eftir dómi og eldsligum vreiðisharmi, sum skal upptæra mótstandararnar.
28 Hann, sum vanvirdi Móselógina, doyði uttan miskunn undir tveimum ella trimum vitnum:
29 Til hvussu mikið svárari revsing, halda tit, skal hann verða hildin verdur, sum hevur traðkað undir fót Son Guðs, og hevur roknað blóð sáttmálans, við hvørjum hann varð halgaður, eitt vanheilagt ting, og hevur gjørt háðan at Anda náðinnar?
30 Tí at vit kenna hann sum hevur sagt, Hevnd *høyrir* mær *til,* eg skal endurgjalda, sigur Harrin. Og aftur, Harrin skal døma fólk sítt.
31 *Tað er* eitt ræðuligt ting at falla inn í hendur hins livandi Guðs.
32 Men kallið aftur til minnis hinar fyrru dagarnar, í hvørjum, eftir *at* tit vóru upplýstir, tit úthildu mikið stríð av líðingum;
33 Lutvís í tí at tit vórðu gjørdir ein skurssjón bæði við háðingum og líðingum; og lutvís í tí at tit gjørdust felagar teirra sum soleiðis vórðu brúktir.
34 Tí at tit høvdu samkenslu við mær í bondum mínum, og tóku gleðiliga ræningina av tykkara góðsi, vitandi í tykkum sjálvum, at tit hava í himni eina betri og eina varandi fæogn.
35 Kastið ikki burtur, tessvegna, treyst tykkara, sum hevur mikið lønar-endurgjald.
36 Tí at tykkum er tørvur á úthaldni, *fyri* at, eftir at tit hava gjørt vilja Guðs, tit máttu móttikið fyrijáttanina.
37 Tí at enn ein lítil stund, og hann, sum skal koma, vil koma, og vil ikki drála.
38 Nú, hin rættvísi skal liva við trúgv: men um *nakar maður* havist undan, mín sál skal hava ongan tokka í honum.
39 Men vit eru ikki av teimum, sum havast undan, til undirgangs; men av teimum, sum trúgva, til frelsing sálarinnar.

KAPITUL 11

NÚ, trúgv er hitt evnisliga av tingum vónað eftir, prógvið um ting ikki sædd.

2 Tí at við̂ henni vunnu hinir eldru ein góðan vitnisburð.

3 Gjøgnum trúgv skilja vit, at verøldirnar vórðu skipaðar við̂ Guðs orði; so at ting, sum eru sædd, vórðu ikki gjørd av tingum sum sýnast.

4 Við̂ trúgv ofraði Ábel Guði eitt meiri avbært sláturoffur enn Cáin, við̂ hvørjum hann vann vitnisburð, at hann var rættvísur, Guð vitnandi um hansara gávur: og við̂ tí hann, verandi deyður, enn talar.

5 Við̂ trúgv varð Ḗnȫch umsettur, at hann skuldi ei síggja deyða; og varð ikki funnin, av tí at Guð hevði umsett hann: tí at áðrenn hans umseting hevði hann henda vitnisburð, at hann toknaðist Guði.

6 Men uttan trúgv *er tað* ómøguligt at toknast *honum:* tí at hann, sum kemur til Guðs, má trúgva at hann er, og *at* hann er ein endurgjaldari av teimum sum dúgligani søkja hann.

7 Við̂ trúgv Nóah, verðandi ávaraður av Guði um tingˇ ikki sædd sum enn *var,* fluttist við ótta, fyrireikaði eina ørk til frelsingina av sínum húsi; við̂ hvørjum hann fordømdi heimin, og gjørdist arvingi at rættvísini sum er við̂ trúgv.

8 Við̂ trúgv Ábraham, tá ið hann varð kallaður at fara út á eitt stað, sum hann skuldi aftaná fáa til arv, lýddi; og hann fór út, ikki vitandi hvagar hann fór.

9 Við̂ trúgv *var* hann í útlegd í fyrijáttanar-landinum, sum *í* einum fremmandum landi, búgvandi í tabernaklum við Ísaaki og Jákobi, arvingunum við honum at hini somu fyrijáttan:

10 Tí at hann væntaði eftir einum staði sum hevur grundvøllir, hvørs byggimeistari og smiður *er* Guð.

11 Gjøgnum trúgv eisini Sára sjálv fekk styrki til at ala sáð, og varð loyst við barn, tá ið hon var yvir aldur, tí at hon dømdi hann trúfastan sum hevði fyrijáttað.

12 Tí runnu tað enntá av ēinum, og honum so góðum sum deyðum, *so mangir* sum stjørnurnar á luftini í fjøldleika, og sum sandurin sum er við sævarstrond óteljiligur.

13 Allir hesir doyði í trúgv, ei havandi móttikið fyrijáttanirnar, men havandi sæð tær langt burturifrá, og vóru sannførdir um *tær,* og fevndu *tær,* og játtaðu, at teir vóru fremmandir og pílagrímar á jørðini.

14 Tí at teir, sum siga slík ting, kunngera týðiligani, at teir søkja eitt land.

15 Og sanniliga, um teir høvdu hugsað um tað *landið,* hvaðani frá teir komu út, *tá* máttu teir hava havt høvi til at hava vent aftur.

16 Men nú tráa teir eftir einum betri *landi,* tað er, einum himinskum: hvørsvegna Guð ikki skammast at verða kallaður Guð teirra: tí at hann hevur fyribúgvið til teirra ein stað.

17 Við̂ trúgv Ábraham, tá ið hann varð royndur, ofraði upp Ísaak: og hann, sum hevði fingið fyrijáttanirnar, ofraði upp sín ēingitna *son,*

18 Um hvønn tað varð sagt, At í Ísaaki skal sáð títt verða kallað:

19 Roknandi, at Guð *var* mentur at reisa *hann* upp, enntá frá teimum deyðu; hvaðani frá eisini hann fekk hann í eini líking.

20 Við̂ trúgv vælsignaði Ísaak*ur* Jákob og Esav viðvíkjandi komandi tingum.

21 Við̂ trúgv Jákob, tá hann var ein doyggjandi, vælsignaði báðar synir Jósephs; og tilbað, *hallandi* uppá kollin á stavni sínum.

22 Við̂ trúgv Józeph, tá ið hann doyði, nevndi burturferð Ísraels barna; og gav *eini* boð viðvíkjandi beinum sínum.

23 Við trúgv Móses, tá ið hann var føddur, varð fjaldur *í* tríggjar mánaðir av foreldrum sínum, av tí at tey sóu, *at hann var so* vænt eitt barn; og tey vóru ikki rædd fyri boði kongsins.

24 Við trúgv Móses, tá ið hann var komin til ára, noktaði at verða kallaður dóttursonur Pharaohs;

25 Kjósandi heldur at líða líðing við fólki Guðs, enn at njóta njótingarnar av synd í eina tíð;

26 Metandi Christi vanvirðing størri ríkidømir enn dýrgripir Egyptalands: tí at hann hevði fyrilit yvirfyri lønar-endurgjaldinum.

27 Við trúgv hann yvirgav Egyptaland, ei óttandi vreiði kongsins: tí at hann helt út, sum síggjandi hann sum ósjónligur er.

28 Gjøgnum trúgv hann helt umleypið, og áslettingina av blóði, at ikki hann, sum oyddi hinar frumbornu, skuldi nema teir.

29 Við trúgv teir fóru ígjøgnum Reyða-hav, sum eftir turrum *landi:* hvørt Egyptarnir, kannandi at gera, vórðu druknaðir.

30 Við trúgv Jerichos múrar fullu niður, eftir *at* teir vórðu kringfarnir runt umkring *í* sjey dagar.

31 Við trúgv skøkjan Ráhab glataðist ei við teimum sum trúðu ikki, tá ið hon hevði tikið ímóti njósnarunum við friði.

32 Og hvat skal eg meira siga? tí at tíðin hevði svitast mær at sagt frá um Gedʹ-e-on, og *um* Barʹ-ak, og *um* Samson, og *um* Jephʹ-thaê; *um* Dávid eisini, og Sámuel, og *um* prophetarnar:

33 Sum gjøgnum trúgv undirløgdu kongadømir, virkaðu rættvísi, lutaðust fyrijáttanir, byrgdu munnar á leyvum,

34 Sløktu grimmleikan av eldi, komust undan svørðseggini, út úr veikleika vórðu gjørdir sterkir, vuksu reystir í bardaga, vendu á flótta herar teirra fremmandu.

35 Kvinnur fingu sínar deyðu reistar til lívs aftur: og aðrir vórðu pínslaðir, ei takandi ímóti útfrían; at teir máttu lutast eina betri uppreisn:

36 Og aðrir høvdu roynslu av *grimmum* háðingum og húðflettingum, ja, hartil av bondum og fongslan:

37 Teir vórðu steinaðir, teir vórðu sagaðir sundur, vórðu freistaðir, vórðu vignir við svørðinum: teir reikaðu um í seyðaskinnum og geitaskinnum; verandi neyðstaddir, trongslaðir, pínslaðir;

38 (Hvørjum heimurin var ikki verdigur:) teir reikaðu *um* í oyðimørkum, og *í* fjøllum, og *í* skorum og hellum av jørðini.

39 Og allir hesir, havandi lutast góðan vitnisburð gjøgnum trúgv, móttóku ikki fyrijáttanina:

40 Guð havandi útvegað okkurt betri ting til okkara, *fyri* at teir uttan okkum skuldu ei verða gjørdir fullkomnir.

KAPITUL 12

HVØRSVEGNA, við tað at vit eisini eru umgirdir við einum so miklum skýggi av vitnum, latum okkum leggja til viks hvørja tyngd, og syndina sum so lættliga darvar *okkum,* og latum okkum renna við tolmóði tað skeið sum frammanfyri okkum er sett,

2 Hyggjandi til Jesu, upphavsmans og fullgerara trúar *okkara;* sum fyri ta gleði, sum frammanfyri honum var sett, úthelt krossin, vanvirðandi skommina, og er setstur niður við høgru hondina av hásæti Guðs.

3 Tí at umhugsið hann, sum úthelt slíka andmæling av syndarum ímóti sær sjálvum, at ikki tit verði troyttaðir og givnir í hugum tykkara.

4 Tit hava ikki enn gjørt mótstøðu at blóði, stríðandi ímóti synd.

5 Og tit hava gloymt áminningina, sum talar við tykkum sum við børn, Sonur mín, vanvirð ikki tú aging Harrans, ella fall í fátt, tá ið tú verðurt hartaður av honum:

6 Tí at hvønn Harrin elskar, agar hann, og húðflettir hvønn son, hvørjum hann tekur ímóti.

7 Um tit úthaldi aging, *so* fer Guð við tykkum sum við sonum; tí at hvør sonur er hann, hvønn faðirin agar ikki?

8 Men um tit veri uttan aging, hvarí allir eru luttakarar, so eru tit óektabørn, og ikki synir.

9 Harafturat hava vit havt fedrar holds okkara, sum rættleiddu *okkum,* og vit veittu *teim* virðing: skulu vit ikki nógv heldur vera í undirgivni yvirfyri Faðir andanna, og liva?

10 Tí at teir sanniliga í nakrar fáar dagar agaðu *okkum* eftir teirra egna tykki; men hann til *okkara* gagn, at *vit* máttu verða luttakarar í hansara heilagleika.

11 Nú, eingin aging í núverandi *stund* tykist at vera gleðilig, men svárlig: hóast hetta, aftaná ber hon hin friðsama ávøkstin av rættvísi at teimum sum eru vand harviðˆ.

12 Hvørsvegna lyftið upp tær hendur sum hanga niður, og hini máttleysu knø;

13 Og gerið beinar rásir til føtur tykkara, at ikki tað, sum er lamið, verði vent út av veginum; men latið tað heldur verða heilað.

14 Fylgið *eftir* friði við allar *menn,* og heilagleika, uttan hvønn eingin maður skal síggja Harran:

15 Gevandi gætur dúgligani, at ikki nakar maður lissi Guðs náði; at ikki nøkur rót av beiskleika, sprettandi upp, órógvi *tykkum,* og harviðˆ mangir verði dálkaðir;

16 At ikki tað *veri* nakar siðloysingur, ella halgivanvirðiligur persónur, eins og Esav, sum fyri ēin bita av mati seldi sín burðarrætt.

17 Tí at tit vita, hvussu ið aftaná, tá ið hann vildi havt arvað signingina, varð hann havnaður: tí at hann fann einkið pláss til iðranar, hóast hann søkti tað umhyggjuliga við tárum.

18 Tí at tit eru ikki komnir at fjallinum sum mátti verðið nomið við, og sum brendi við eldi, ella at sorta, og myrkri, og harðveðri,

19 Og ljóðinum av einum lúðuri, og røddini av orðum; hvørja *rødd* teir, sum hoyrdu, bønaðu, at orðið skuldi ei verða talað til teirra meira:

20 (Tí at teir kundu ikki úthalda tað, sum varð boðið, Og um so mikið sum eitt djór nemi fjallið, skal tað verða steinað, ella stoytt ígjøgn við einum píli:

21 Og so ræðulig var sjónin, *at* Móses segði, Eg ovurhondsligani óttist og skelvi:)

22 Men tit eru komnir at Sĭ´ŏn fjalli, og at staði hins livandi Guðs, tí himinska Jerusalem, og til ein óteljiligan flokk av einglum,

23 Til aðalsavnaðin og kirkju hinna frumbornu, sum eru skrivaðir í himni, og til Guðs, Dómara alra, og til andanna av rættvísum monnum — gjørdir fullkomnir,

24 Og til Jesu, millumgongumannin av hinum nýggja sáttmála; og til áslettingarblóðið, sum talar betri tingˇ enn *tað av* Ábeli.

25 Síggið til, at tit frávísi ikki hann, sum talar. Tí at um teir komust ikki undan, sum frávístu hann, sum talaði á jørð*ini,* mikið meira *skulu ikki* vit *komast undan,* um vit venda burtur frá honum, sum *talar* frá himni:

26 Hvørs rødd tá risti jørðina: men nú hevur hann lovað, sigandi, Enn ēinaferð afturat risti eg ikki jørðina einans, men eisini himin.

27 Og hetta *orðið,* Enn ēinaferð afturat, uppmálar burturtøkuna

av teimum tingunum sum verða rist, sum um ting sum eru gjørd, at tey tingini, sum ikki kunnu verða rist, mega verða verandi.

28 Hvørsvegna vit, móttakandi kongadømi sum kann ikki verða vikað, latum okkum hava náði, við^ hvørji vit mega tæna Guði góðtakiligani við virðing og gudiligum ótta:

29 Tí at okkara Guð *er* ein upptærandi eldur.

KAPITUL 13

LATIÐ bróðurligan kærleika halda fram.

2 Verið ikki gloymnir at undirhalda fremmandum: tí at harvið^ hava summir undirhildið einglum óvarnandi.

3 Minnist til teirra sum eru í bondum, sum bundnir við teimum; *og* til teirra sum líða mótgongd, sum verandi sjálvir eisini í likaminum.

4 Hjúnalag *er* ærusamt í øllum, og songin ódálkað: men horkallar og horfremjarar vil Guð døma.

5 *Latið* atferð *tykkara vera* uttan ágirnd; *og verið* nøgdir við slík ting sum tit hava: tí at hann hevur sagt, Eg vil aldri fara frá tær, ella yvirgeva teg.

6 So at vit mega við dirvi siga, Harrin *er* hjálpari mín, og eg vil ikki óttast hvat maður skal gera mær.

7 Minnist til teirra sum hava stjórnina yvir tykkum, sum hava talað Guðs orð til tykkara: hvørs trúgv fylgið, gevandi far um endalyktina á *teirra* atferð.

8 Jesus Christus — hin sami í gjár, og í dag, og um ævir.

9 Verðið ikki bornir umkring við ymsum og fremmandum Guðslærum. Tí at *tað er* eitt gott ting at hjartað verði grundfest við náði; ikki við matum, sum hava ikki gagnað teimum sum hava verið upptiknir harí.

10 Vit hava eitt altar, av hvørjum teir hava ongan rætt at eta, sum tæna tabernaklinum.

11 Tí at kropparnir av teimum djórunum, hvørs blóð verður ført inn í halgidómin av høvuðsprestinum fyri synd, verða brendir uttanfyri leirin.

12 Hvørsvegna Jesus eisini, til *tess* at hann mátti halga fólkið við sínum egna blóði, leið uttanfyri portrið.

13 Latum okkum tí fara út til hansara útum leirin, berandi vanvirðing hansara.

14 Tí at her hava vit ongan framhaldandi stað, men vit søkja ein *ið* koma skal.

15 Við^ honum, tessvegna, latum okkum ofra lovprísingar-sláturofrið til Guðs áframhaldandi, tað er, ávøkstin av *okkara* vørrum, veitandi tøkkir til navns hansara.

16 Men at gera gott og at deila, gloymið ikki: tí við slík offur Guð er væl nøgdur.

17 Lýðið teir sum hava stjórnina yvir tykkum, og undirgevið tykkum: tí at teir vaka yvir tykkara sálum sum teir sum mugu geva roknskap, *fyri* at teir mega gera tað við gleði, og ikki við sorg: tí at tað *er* ógagnligt hjá tykkum.

18 Biðjið fyri okkum: tí vit líta á, *at* vit hava góða samvitsku, í øllum tingum villigir at liva ærliga.

19 Men eg bøni *tykkum* tess heldur at gera hetta, at eg má verða givin aftur til tykkara tess skjótari.

20 Nú, Guð friðarins, sum førdi aftur frá teimum deyðu váran Harra Jesus, handa mikla hirða seyðanna, gjøgnum blóðið av hinum ævigtvarandi sáttmála,

21 Geri tykkum fullkomnar í hvørjum góðum verki, til at gera vilja hansara, virkandi í tykkum tað sum er væltoknandi í eygsjón hansara, gjøgnum Jesus Christ; til hvørs *veri* dýrd um ævir og ævir. Á-měn.

22 Og eg bøni tykkum, brøður, tolið formaningar-orðið: tí at eg havi skrivað eitt bræv til tykkara í fáum orðum.
23 Viti tit, at bróðir *okkara,* Timotheus, er settur í frælsi; við hvørjum, um hann komi brátt, vil eg síggja tykkum.
24 Heilsið øllum teimum sum hava stjórnina yvir tykkum, og øllum teimum heilagu. Teir úr Italiu lata heilsa tykkum.
25 Náði *veri* við tykkum øllum. Á-mën.

¶ Skrivaður til Hebrëaranna frá Italiu av Timotheusi.

HIN ALMENNI EPISTIL JÁKOBS.

KAPITUL 1

JÁKOB, ein tænari Guðs og Harrans Jesu Christs, til hinna tólv ætta, sum eru spjaddar umkring, heilsan.
2 Brøður mínir, roknið tað *fyri* bera gleði, tá ið tit detta inn í ymsar freistingar;
3 Vitandi *hetta,* at roynslan av tykkara trúgv virkar tolmóð.
4 Men latið tolmóð hava *sítt* fullkomna verk, at tit mega vera fullkomnir og heilrunnir, vantandi einkið.
5 Um nøkrum av tykkum fattist vísdóm, lat hann umbiðja frá Guði, sum gevur til alra *manna* gávumildiliga, og átalar ikki; og tað skal verða givið honum.
6 Men lat hann umbiðja í trúgv, einkið vaklandi. Tí at hann, sum vaklar, er líkur eini sjóvaraldu, rikin við vindinum og syft.
7 Tí at lat ikki tann mannin hugsa, at hann skal móttaka nakað ting frá Harranum.
8 Ein tvísintur maður *er* óstøðugur í øllum sínum vegum.
9 Lat bróðurin av lágari støðu fegnast í, at hann er upphevjaður:
10 Men hin ríki í, at hann er gjørdur lágur: tí at sum blóman á grasinum skal hann hvørva burtur.
11 Tí at sólin er ikki meir enn risin við brennandi hita, uttan hon følnar grasið, og blóma tess fellur, og yndisleikin á skapi tess ferst: soleiðis eisini skal hin ríki maðurin svinna burtur á vegum sínum.
12 Signaður *er* tann maður sum útheldur freisting: tí at tá ið hann er royndur, skal hann fáa lívsins krúnu, sum Harrin hevur lovað til teirra sum elska hann.
13 Lat ongan mann siga, tá ið hann verður freistaður, Eg verði freistaður av Guði: tí at Guð kann ikki verða freistaður av illum, eiheldur freistar hann nakran mann:
14 Men hvør *ein* maður verður freistaður, tá ið hann verður drigin burtur av síni egnu girnd, og lokkaður.
15 Síðan, tá ið girnd hevur getið, ber hon fram synd: og synd, tá ið hon er fullførd, ber fram deyða.
16 Farið ikki skeivir, mínir háttelskaðu brøður.
17 Hvør *ein* góð gáva og hvør *ein* fullkomin gáva er omanifrá, og kemur niður frá Faðir ljósanna, hjá hvørjum er eingin umskiftiligsemi, eiheldur umveltingarskuggi.
18 Av sínum egna vilja gat hann okkum við sannleiks-orðinum, til *tess* at vit skuldu vera eitt slag av frumávøkstum av hansara skapningum.
19 Av hvørji grund, háttelskaðu

brøður mínir, lat hvønn mann vera snarur at hoyra, seinur at tala, seinur til vreiði:
20 Tí at vreiði mans virkar ikki rættvísi Guðs.
21 Hvørsvegna leggið burtur alla óreinsku og leivd av óflýggjaskapi, og móttakið við eyðmjúkleika tað gróðursetta orðið, sum er ført fyri at frelsa sálir tykkara.
22 Men verið tit gerarar orðsins, og ikki hoyrarar einans, svíkjandi tykkum sjálvar.
23 Tí at um nakar veri ein hoyrari orðsins, og ikki ein gerari, hann er líkur manni, skoðandi sítt náttúrliga andlit í einum glari:
24 Tí at hann skoðar seg sjálvan, og fer sín veg, og beinanvegin gloymir hvørsháttar maður hann var.
25 Men hvør*iðenn* lítur inn í hina fullkomnu lóg frælsis, og heldur áfram *hará,* hann, verandi ikki ein gloymin hoyrari, men ein gerari verksins, hesin maðurin skal vera signaður í gerð síni.
26 Um nakar maður tykkara millum tykist at vera trúrøkin, og heldur ei síni tungu í teymum, men villleiðir sítt egna hjarta, trúrøknin hjá hesum manni *er* fáfongd.
27 Rein trúrøkni og ódálkað frammi fyri Guði og Faðirinum er hetta, At vitja hini faðirleysu og einkjur í teirra líðing, *og* at varða seg sjálvan óblettaðan frá heiminum.

KAPITUL 2

BRØÐUR mínir, havið ikki trúgv várs Harra Jesu Christs, *Harra* dýrdarinnar, *saman* við metan av persónum.
2 Tí at um tað komi til savnaðar tykkara ein maður við gullringi, í føgrum klædnaði, og tað komi inn eisini ein fátækur maður í vána spjørrum;
3 Og tit havi metan fyri honum sum er í teimum kátu klæðunum, og sigi við hann, Sit tú her í einum góðum plássi; og sigi við hin fátæka, Statt tú har, ella sit her undir fótskammli mínum:
4 Eru tit ikki tá mismunasamir í tykkum sjálvum, og eru vorðnir dómarar av illum hugsanum?
5 Hoyrið, mínir háttelskaðu brøður, Hevur ikki Guð útvalt hinar fátøku hesa heims – ríkar í trúgv, og arvingar til kongadømið sum hann hevur lovað til teirra sum elska hann?
6 Men tit hava vanvirt hin fátæka. Kúga ikki ríkir menn tykkum, og draga tykkum framfyri dómstólarnar?
7 Guðsspotta ikki teir tað verdiga navn, við^ hvørjum tit eru kallaðir?
8 Um tit uppfylli hina kongligu lóg, samsvarandi við skriftina, Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg, *so* gera tit væl:
9 Men um tit havi metan fyri persónum, *so* fremja tit synd, og verða kendir sekir av lógini sum misbrótarar.
10 Tí at hvørsumhelst *ið* skal halda alla lógina, og tó forbróta *seg* í ēinum *punkti,* hann er sekur í øllum.
11 Tí at hann, sum segði, Frem ikki hordóm, segði eisini, Drep ikki. Nú, um tú fremji ongan hordóm, tó um tú drepi, *so* ert tú vorðin ein misbrótari av lógini.
12 Soleiðis talið tit, og soleiðis gerið, sum teir sum skulu verða dømdir eftir lóg frælsis.
13 Tí at hann skal fáa dóm uttan miskunn, sum onga miskunn hevur sýnt; og miskunn fegnast ímóti dómi.
14 Hvat gagnar *tað,* brøður mínir, tó *at* ein maður sigi, *at* hann hevur trúgv, og havi ikki gerningar? kann trúgv frelsa hann?
15 Um ein bróðir ella systir veri *seg* nakin, og sør fyri dagliga føði,

16 Og ēin av tykkum sigi við tey, Farið avstað í friði, verið *tit* vermd og mettaði; hóast hetta, tit geva teimum ikki tey tingini sum eru neyðug til likamið; hvat gagnar *tað?*

17 Enntá soleiðis trúgv, um hon ei hevur gerningar, er deyð, verandi einsamøll.

18 Ja, ein maður kann siga, Tú hevurt trúgv, og eg havi gerningar: sýn mær tína trúgv uttan gerningar tínar, og eg vil sýna tær mína trúgv av gerningum mínum.

19 Tú trýrt, at tað er ēin Guð; tú gert væl: djevlarnir trúgva við, og skelva.

20 Men vilt tú vita, O fáfongdi maður, at trúgv uttan gerningar er deyð?

21 Varð ikki Ábraham, faðir okkara, rættvísgjørdur við^ gerningum, tá ið hann hevði ofrað Ísaak, son sín, uppiá altarinum?

22 Sært tú hvussu trúgv virkaði við hansara gerningum, og við^ gerningum varð trúgv gjørd fullkomin?

23 Og skriftin varð uppfylt, sum sigur, Ábraham trúði Guði, og tað varð tilroknað honum til rættvísi: og hann varð kallaður Guðs vinur.

24 Tit síggja tá, hvussu ið við^ gerningum maður verður rættvísgjørdur, og ikki við^ trúgv eina.

25 Líkaleiðis eisini varð ikki skøkjan Ráhab rættvísgjørd við^ gerningum, tá ið hon hevði tikið ímóti sendiboðunum, og hevði sent *teir* út ein annan veg?

26 Tí at eins og likamið uttan andan er deytt, soleiðis trúgv uttan gerningar er deyð eisini.

KAPITUL 3

BRØÐUR mínir, verið ikki mangir meistarar, vitandi at vit skulu fáa tess sverari dómfelling.

2 Tí at vit allir í mongum tingum *volda* meinboga. Um nakar maður *voldi* ikki meinboga í orði, hin sami *er* ein fullkomin maður, *og* førur fyri eisini at halda øllum likaminum í teymum.

3 Sí, vit seta boygsl í munnin á hestunum, at teir mega lýða okkum; og vit venda runt heila teirra likami.

4 Skoðið eisini skipini, sum tó *at tey veri* so mikil, og *verða* rikin av hørðum vindum, tó verða tey vend runt við einum sera lítlum róðuri, hvagarsumhelst *ið* stýrimanninum lystir.

5 Enntá soleiðis er tungan ein lítil limur, og reypar miklar lutir. Sí, hvussu miklum evni ein lítil eldur kyndir *í!*

6 Og tungan *er* ein eldur, ein heimur av misgerð: soleiðis er tungan millum limir okkara, at hon dálkar alt likamið, og setur eld á náttúrunnar leið; og hana er settur eldur á av helviti.

7 Tí at hvørt slag av djórum, og av fuglum, og av høggormum, og av tingum í sjónum, verður tamt, og hevur verðið tamt av mannkyni:

8 Men tunguna kann eingin maður temja; *hon er* ein óstýrlig ilska, full av deyðiligum eitri.

9 Við henni vælsigna vit Guð, enntá Faðirin; og við henni banna vit menn, sum eru gjørdir eftir líksemi Guðs.

10 Út úr sama munni útgongur signing og banning. Brøður mínir, hesi ting áttu ikki so at verið.

11 Sendir fram ein kelda á sama staði søtt *vatn* og beiskt?

12 Kann fikutræið, brøður mínir, bera olivinber? ella eitt víntræ fikur? soleiðis *kann* eingin kelda bæði veita salt vatn og frískt.

13 Hvør *er* ein vísur maður og yvirklæddur við kunnleika tykkara millum? lat hann sýna út frá eini góðari atferð síni verk við vísdóms spakføri.

14 Men um tit havi beiska

øvund og stríð í hjørtum tykkara, rósist ikki, og lúgvið ikki ímóti sannleikanum.

15 Hesin vísdómur stígur ikki niður omanífrá, men *er* jarðiskur, sansaligur, djevlaligur.

16 Tí at har *sum* øvundan og stríð *er,* har *er* ørkymlan og hvørt ilt verk.

17 Men tann vísdómurin, sum er omanífrá, er fyrst reinur, síðan friðsamur, mildur, *og* nemmur at verða bønaður, fullur av miskunn og góðum fruktum, uttan partiskni, og uttan hykl.

18 Og rættvísis fruktin verður sáað í friði av teimum ið fáa frið í lag.

KAPITUL 4

HVAÐANI frá *koma* kríggj˘ og bardagar tykkara millum? *koma tey* ikki haðani, *enntá* frá tykkara girndum sum kríggjast í limum tykkara?

2 Tit girnast, og hava ikki: tit drepa, og tráa at hava, og kunnu ikki lutast: tit berjast og kríggjast, tó hava tit ikki, av tí at tit umbiðja ikki.

3 Tit umbiðja, og fáa ikki, av tí at tit umbiðja órætt, at tit mega upptæra *tað* uppá tykkara girndir.

4 Tykkara horkallar og horinnur, vita tit ikki, at vinskapur heimsins er figgindskapur hjá Guði? hvørsumhelst, tessvegna, *ið* vil vera vinur heimsins, er figgindi Guðs.

5 Halda tit, at skriftin sigur í fáfongd: andin, sum býr í okkum, lystir til øvundar?

6 Men hann gevur meiri náði. Hvørsvegna hann sigur, Guð stendur hinum dramblátu ímóti, men gevur teimum eyðmjúku náði.

7 Undirgevið tykkum sjálvar tí fyri Guði. Standið ímóti djevlinum, og hann vil flýggja frá tykkum.

8 Nærkist til Guðs, og hann vil nærkast til tykkara. Reinsið *tykkara* hendur, *tit* syndarar; og skírgið *tykkara* hjørtu, *tit* tvísintu.

9 Verið nívdir, og syrgið, og grátið: tykkara látur verði vendur til syrgjan, og *tykkara* frøi til tyngd.

10 Eyðmýkið tykkum sjálvar í eygsjón Harrans, og hann skal lyfta tykkum upp.

11 Talið ikki ilt hvør um annan, brøður. Hann, ið talar ilt um bróður *sín,* og dømir bróður sín, talar ilt um lógina, og dømir lógina: men um tú dømi lógina, *so* ert tú ikki ein gerari av lógini, men ein dómari.

12 Tað er ēin lóggevari, sum er førur fyri at frelsa og at týna: hvør ert tú sum dømirt ein annan?

13 Komið nú tit, sum siga, Í dag ella í morgin vilja vit fara inn í tann *og tann* staðin, og halda áfram har eitt ár, og keypa og selja, og fáa vinning:

14 Hvar ið tit vita ikki, hvat *ið verða skal* í morgin. Tí at hvat *er* lív tykkara? Tað er enntá ein roykur, sum birtist í eina stutta tíð, og so hvørvur burtur.

15 *Ístaðin* fyri tað *áttu* tit at siga, Um Harrin vilji, skulu vit liva, og gera hetta, ella hatta.

16 Men nú fegnast tit í tykkara rósanum: allur slíkur fagnaður er óndur.

17 Tessvegna, hjá honum sum veit at gera gott, og ger *tað* ikki, hjá honum er tað synd.

KAPITUL 5

KOMIÐ nú, *tit* ríku menn, grátið og ýlið um tykkara vanlukkur sum skulu koma omanyvir *tykkum.*

2 Tykkara ríkdómar eru spiltir, og tykkara klæðir eru møletin.

3 Tykkara gull og silvur er etjað; og rusturin av teimum skal vera ein vitnisburður ímóti tykkum, og skal eta kjøt tykkara, sum var tað eldur. Tit hava hópað dýrgripir saman til hinar síðstu dagarnar.

4 Sí, lønin hjá arbeiðsmonnunum, sum hava skorið niður akrar tykkara, sum av tykkum er hildin aftur við sviki, rópar: og rópini av teimum, sum hava skorið, eru farin inn í oyruni á Harra sabaoths.

5 Tit hava livað í njóting á jørðini, og verið teymaleysir; tit hava nørt tykkara hjørtu, sum á sláturdegi.

6 Tit hava dómfelt *og* dripið hin rættvísa; *og* hann stendur ikki ímóti tykkum.

7 Verið tolnir, tessvegna, brøður, at komu Harrans. Sí, bóndin bíðar eftir tí dýrabæra ávøkstinum av jørðini, og hevur leingi tol eftir honum, inntil hann móttaki hitt snimma og seinna regnið.

8 Verið tit eisini tolmóðigir; grundfestið hjørtu tykkara: tí at koma Harrans dregst nær.

9 Gremjið ikki hvør ímóti øðrum, brøður, at ikki tit verði fordømdir: sí, dómarin stendur fyri durinum.

10 Takið, mínir brøður, prophetarnar, sum hava talað í navni Harrans, til eina fyrimynd um at líða pínslu, og um tolmóð.

11 Sí, vit telja teir sælar, sum halda út. Tit hava hoyrt um tolmóð Jobs, og hava sæð endalykt Harrans; at Harrin er sera samkenslufullur, og av eymligari miskunn.

12 Men uppum øll ting, brøður mínir, svørjið ikki, hvørki við himin, eiheldur við jørðina, eiheldur við nakran annan eið: men latið tykkara ja vera ja; og *tykkara* nei nei; at ikki tit falli inn í fordøming.

13 Er nakar tykkara millum líðandi? lat hann biðja. Er nakar glaður? lat hann syngja psálmar.

14 Er nakar sjúkur tykkara millum? lat hann kalla á hinar elstu av kirkjuni; og lat teir biðja yvir honum, salvandi hann við olju í navni Harrans:

15 Og trúarbønin skal frelsa hin sjúka, og Harrin skal reisa hann upp; og um hann havi framt syndir, tær skulu verða fyrigivnar honum.

16 Játtið *tykkara* feilir hvør fyri øðrum, og biðjið hvør fyri øðrum, at tit mega verða grøddir. Hin virknaðarsama, inniliga bønin av rættvísum manni megnar mikið.

17 Ē-lī´-ās var maður, undirlagdur líkar sinnisrørslur sum vit eru, og hann bað inniligani, at tað mátti ikki regnað: og tað regnaði ikki á jørðina yvir skeiðið á trý ár og seks mánaðir.

18 Og hann bað aftur, og himinin gav regn, og jørðin bar fram sín ávøkst.

19 Brøður, um nakar av tykkum fari skeivur frá sannleikanum, og ēin umvendi hann;

20 Lat hann vita, at hann, sum umvendir syndaran frá villfaringini av hansara vegi, skal frelsa eina sál frá deyða, og skal fjala fjøld av syndum.

HIN FYRRI ALMENNI EPISTIL PÆTURS.

KAPITUL 1

PÆTUR, ein ápostul Jesu Christs, til hinna fremmandu, spjaddir út ígjøgnum Pontus, Galatiu, Căp-pă-dŏ´-cī-ŭ, Asiu, og Bī-thý´-nī-ŭ,

2 Útvaldir samsvarandi við fyrivitan Guðs Faðirs, gjøgnum halgan av Andanum, at lýdni og ásletting av blóði Jesu Christs: Náði at tykkum, og friður, veri margfaldað.

3 Vælsignaður *veri* Guð og Faðir

várs Harra Jesu Christs, sum samsvarandi við sína ríkiligu miskunn hevur gitið okkum aftur at eini lívligari vón viðˆ uppreisn Jesu Christs frá teimum deyðu,

4 Til arv óspilluligan, og ódálkaðan, og sum følnar ikki burtur, varðveittur í himni til tykkara,

5 Sumᵖ verða varðveittir viðˆ kraft Guðs gjøgnum trúgv *fram*at frelsu — tilreiðar at verða opinberað í hini síðstu tíð.

6 Í hvørji tit stórliga fegnast, tó *at* nú í eitt skeið, um neyðugt veri, tit eru í tyngslu gjøgnum margfaldar freistingar:

7 Át roynslan av tykkara trúgv, verandi mikið dýrmætari enn av gulli sum forgongur, tó *at* tað verði roynt við eldi, mátti verðið funnin til lovs og heiðurs og dýrdar við birting Jesu Christs:

8 Hvønn, havandi ikki sæð, tit elska; í hvørjum, hóast nú tit síggja *hann* ikki, tó trúgvandi, tit fegnast við frøi ó*fram*sigiligari og fullari av dýrd:

9 Móttakandi endalyktina av tykkara trúgv, *enntá* frelsuna av sálum *tykkara*.

10 Um hvørja frelsu propheturnir hava fregnað og kannað ídnisliga, sum propheteraðu um náðina *sum skuldi koma* til tykkara:

11 Kannandi hvørja, ella hvørsháttar tíð, Andi Christs, sum var í teimum, uppmálaði, tá ið hann frammanundan vitnaði *um* líðingar Christs, og dýrdina sum skuldi fylgja.

12 Hvørjum tað var opinberað, at ikki teimum sjálvum, men okkum teir tæntu teir lutir, sum nú eru fráboðaðir tykkum av teimum sum hava prædikað tykkum gleðiboðskapin, við Halga Andanum, sendum niður frá himni; hvørjar lutir einglarnir tráa at líta inn í.

13 Hvørsvegna gyrðið upp lendar sinnis tykkara, verið edrúir, og vónið til endan eftir teirri náði, sum eigur at verða borin tykkum við opinbering Jesu Christs;

14 Sum lýðin børn, ikki mótandi tykkum sjálvar samsvarandi við hinar undanfarnu girndirnar í tykkara vankunnu:

15 Men eins og hann, sum hevur kallað tykkum, er heilagur, soleiðis verið tit heilagir í øllum háttarlagi av atferð;

16 Tí at skrivað stendur, Verið *tit* heilagir; tí at eg eri heilagur.

17 Og um tit kalli á Faðirin, sum uttan meting av persónum dømir samsvarandi við gerning hvørs mans, ferðist tíðina av tykkara útlegd *her* í ótta:

18 Við tað at tit vita, at tit vórðu ikki endurkeyptir við forgongiligum lutum, *so sum* silvuri og gulli, frá tykkara fáfongdu atferð, *móttikin* viðˆ siði frá tykkara fedrum;

19 Men við hinum dýrabæra blóði Christs, sum av einum lambi — uttan lýti og uttan blett:

20 Sum sanniliga varð fyrifram skipaður áðrenn grundlegging veraldarinnar, men varð eyðsýndur í hesum síðstu tíðum fyri tykkum,

21 Sum av honum trúgva á Guð, sum reisti hann upp frá teimum deyðu, og gav honum dýrd; at tykkara trúgv og vón máttu vera á Guð.

22 Við tað *at* tit hava skírgað tykkara sálir í at lýða sannleikan gjøgnum Andan at ófalsaðum alski av brøðrunum, *siggið til at tit* elski hvør annan við einum reinum hjarta inniliga:

23 Verandi endurføddir, ikki av forgongiligum sáði, men av óforgongiligum, viðˆ Guðs orði, sum livir og verður um ævir.

24 Tí at alt kjøt *er* sum gras, og øll dýrdin hjá manni sum blóman hjá grasi. Grasið følnar, og tess blóma fellur burtur:

25 Men Harrans orð varir um ævir. Og hetta er tað orðið sum viðˆ gleðiboðskapinum er prædikað tykkum.

KAPITUL 2

HVØRSVEGNA, leggjandi til viks allan illvilja, og alt fals, og hyklaríir, og øvundanir, og allar illmælanir,

2 Sum nýfødd pinkubørn, tráið hina falsleysu mjólk orðsins, at tit mega vaksa harav:

3 Um so veri, *at* tit havi smakkað, at Harrin *er* náðisamur.

4 Til hvørs komandi, *sum at* einum livandi steini, víst vrakaður av monnum, men útvaldur av Guði, *og* dýrabærur,

5 Tit eisini, sum lívligir steinar, verða bygdir upp eitt andligt hús, eitt heilagt prestadømi, at ofra upp andlig sláturoffur, góðtakilig hjá Guði viðˆ Jesusi Christi.

6 Hvørsvegna eisini tað er innihildið í skriftini, Sí, eg leggi í Sí´ón ein aðalhyrnisstein, útvaldan, dýrabæran: og hann, sum trýr á hann, skal ei verða til skammar.

7 Tykkum tessvegna, sum trúgva, *er hann* dýrabærur: men teimum ið eru ólýdnir, steinurin sum smiðirnir vrakaðu, hin sami er gjørdur høvuðs horn*steinurin,*

8 Og ein snávingarsteinur, og ein meinbogaklettur, *enntá hjá teimum* sum snáva um orðið, verandi ólýdnir: at hvørjum teir eisini vórðu útnevndir.

9 Men tit *eru* ein útvøld ætt, eitt kongligt prestadømi, ein heilag tjóð, eitt seregið fólk; at tit skuldu sýna fram lovprísanir hansara sum hevur kallað tykkum út úr myrkri inn í sítt undrunarsama ljós:

10 Sum í farnari tíð *vóru* ikki eitt fólk, men *eru* nú Guðs fólk: sum høvdu ikki fingið miskunn, men nú hava fingið miskunn.

11 Kærliga háttelskaðu, eg bøni *tykkum* sum fremmandar og pílagrímar, haldið tykkum frá kjøtligum girndum, sum kríggjast ímóti sálini;

12 Havandi tykkara atferð ærliga millum Heidninganna: til *tess* at, hvar ið teir tala ímóti tykkum sum illgerðarmenn, teir mega, av *tykkara* góðu verkum sum teir skulu skoða, dýrðmeta Guð á vitjunardeginum.

13 Undirgevið tykkum sjálvar fyri hvørji fyriskipan manna, Harrans vegna: hvørt tað veri *seg* fyri konginum, sum hægsta;

14 Ella yvirfyri landsstjórum, sum yvirfyri teimum ið eru sendir av honum til revsingina av illgerðarmonnum, og til prísingina av teimum ið gera væl.

15 Tí at so er vilji Guðs, at við at gera væl, mega tit teppa fákunnuna hjá dársomum monnum:

16 Sum frælsir, og ikki brúkandi *tykkara* frælsi sum eitt skálkaskjól fyri illviljaskap, men sum tænarar Guðs.

17 Ærið allar *menn*. Elskið brøðraskapin. Óttist Guð. Ærið kongin.

18 Tænarar, *verið* undirgivnir fyri *tykkara* meistarum við øllum ótta; ikki einans fyri teimum góðu og mildu, men eisini fyri teimum rangvørgu.

19 Tí at hetta *er* tøkk vert, um maður av samviti við Guð úthaldi kvøl, líðandi órættliga.

20 Tí at hvat rós *er tað*, um, tá ið tit verða bardir fyri tykkara feilir, tit skulu taka tað tolmóðiga? men um, tá ið tit gera væl, og líða *fyri tað*, tit taki tað tolmóðiga, hetta *er* góðtakiligt hjá Guði.

21 Tí at enntá til tess vórðu tit kallaðir: av tí at Christus eisini leið fyri okkum, eftirlatandi okkum eitt fyridømi, at tit skuldu fylgja hansara fótasporum:

22 Sum[p] gjørdi onga synd, eiheldur varð svik funnið í hansara munni:

23 Sum, tá ið hann varð deildur, deildi ikki aftur; tá ið hann leið, hann hótti ikki; men leit *seg* upp til hansara sum dømir rættvísliga:
24 Sum sjálvasti sjálvur bar okkara syndir í sínum egna likami á træið, *fyri* at vit, verandi deyðir mót*vegis* syndum, skuldu liva yvirfyri rættvísi: viðˆ hvørs fleingjum tit vórðu grøddir.
25 Tí at tit vóru sum seyðir, farandi á strok; men eru nú vendir aftur at Hirða og Biskupi sála tykkara.

KAPITUL 3

LÍKALEIÐIS, tit ektakonur, *verið* í undirgivni fyri tykkara egnu ektamonnum; at, um nakrir lýði ikki orðinum, teir eisini mega uttan orðið verða vunnir við atferðini hjá ektakonunum;
2 Meðan teir skoða tykkara kýsku atferð, *samkoplaða* við ótta.
3 Hvørs prýðing, lat hana ei vera handa útvortis *prýðing* av at flætta hárið, og av at vera í gulli, ella av ílating í skartaklæði;
4 Men *lat hana vera* hin duldi maður hjartans, í tí sum er ikki forgongiligt, *enntá prýðingin* av einum eyðmjúkum og stillum anda, sum er í eygsjón Guðs av miklum virði.
5 Tí eftir hesum háttarlagi í hini gomlu tíð, hinar heilagu kvinnur eisini, sum litu á Guð, prýddu seg sjálvar, verandi í undirgivni yvirfyri sínum egnu ektamonnum:
6 Enntá sum Sára lýddi Ábraham, kallandi hann harra: hvørs døtur tit eru, so leingi sum tit gera væl, og eru ikki ræddar fyri nakrari ræðslu.
7 Somuleiðis, tit ektamenn, búgvið við *teimum* samsvarandi við kunnleika, gevandi ektakonuni heiður, sum hinum veikara keri, og sum verandi arvingar saman til náði lívsins; at tykkara bønir verði ikki hindraðar.
8 At enda, *verið* tit allir av einum huga, havandi várkunn hvør við øðrum, elskið sum brøður, *verið* samkenslufullir, *verið* kurteisligir:
9 Ei løndandi ilt fyri ilt, ella deilan fyri deilan: men tvørturímóti signing; vitandi, at tit eru har*fram*at kallaðir, at tit skuldu arva eina signing.
10 Tí at hann sum vil elska lív, og síggja góðar dagar, lat hann halda síni tungu aftur frá illum, og sínar varrar, at tær tali einkið fals:
11 Lat hann skýggja ilt, og gera gott; lat hann søkja frið, og stunda eftir honum.
12 Tí at Harrans eygu *eru* yvir teimum rættvísu, og hans oyru *eru opin* at teirra bønum: men Harrans andlit *er* ímóti teimum sum gera ilt.
13 Og hvør *er* hann sum man granda tykkum, um tit veri eftirfylgjarar av tí sum er gott?
14 Men og um tit líði fyri rættvísis skuld, sælir *eru tit:* og verið ikki bangnir fyri teirra ræðslu, eiheldur verið órógvaðir;
15 Men halgið Harran Guð í hjørtum tykkara: og *verið* tilreiðar altíð at *geva* eitt svar til hvønn mann sum biður tykkum um frágreiðing fyri ta vón sum er í tykkum, við eyðmýkt og ótta:
16 Havandi góða samvitsku; *so* at, hvar ið teir tala ilt um tykkum, sum um illgerðarmenn, teir mega skammast sum falsligani ákæra tykkara góðu atferð í Christi.
17 Tí at *tað er* betri, um Guðs vilji so veri, at tit líði fyri vælgering, enn fyri illgering.
18 Tí at Christus eisini hevur ëina ferð liðið fyri syndir, hin rættvísi fyri hinar órættvísu, at hann mátti føra okkum til Guðs, verðandi tikin av lívi í kjøtinum, men livandigjørdur av Andanum:
19 Viðˆ hvørjum eisini hann fór og prædikaði fyri andunum í fongsli;

20 Sum onkuntíð vóru ólýdnir, tá ið ēinaferð Guðs langmóð bíðaði á døgum Nóah, meðan ørkin var í fyrireiking, hvarí fáar, tað er átta sálir, vórðu frelstar viðˆ vatni.
21 Hin líka mynd við hvat *enntá* dópur eisini nú frelsir okkum, (ikki burturtøkan av óreinsku kjøtsins, men aftursvarið av eini góðari samvitsku mótvegis Guði,) viðˆ uppreisn Jesu Christs:
22 Sum er farin inn í himin, og er við høgru hond Guðs; einglar og myndugleikar og máttir verandi gjørdir undirgivnir honum.

KAPITUL 4

EFTIRSUM tá at Christus hevur liðið fyri okkum í kjøtinum, brynjið tykkum á sama hátt við hinum sama sinni: tí at hann, sum hevur liðið í kjøtinum, er hildin uppat frá synd;
2 At hann ei longur skuldi liva restina av *síni* tíð í kjøtinum mótvegis lystum manna, men mótvegis vilja Guðs.
3 Tí hin lidna tíðin av *okkara* lívi má vera okkum nóg mikið at hava virkað vilja Heidninganna, tá ið vit gingu í skendsku, girndum, ovurnøgd av víni, ólátaskapum, festingum, og andstyggiligum avgudadýrkingum:
4 Í hvørjum teir halda tað undarligt, at tit renna ikki við *teimum* til hitt sama ovurryggjaloysi, talandi ilt um *tykkum:*
5 Sum skulu geva roknskap til hansara sum er tilreiðar at døma hinar livandi og hinar deyðu.
6 Tí fyri hesa grund varð gleðiboðskapurin prædikaður eisini fyri teimum ið eru deyðir, at teir máttu verða dømdir samsvarandi við menn í kjøtinum, men liva samsvarandi við Guð í andanum.
7 Men endin á øllum tingum er fyri hond: verið tit tessvegna edrúir, og vakið til bønar.
8 Og framum øll ting havið inniliga vælvild tykkara millum: tí at vælvild skal hylja fjøldina av syndum.
9 Brúkið gestablídni hvør móti øðrum uttan knarran.
10 Eins og hvør maður hevur móttikið gávuna, *enntá soleiðis* tænið hina somu hvør til annars, sum góðir húshaldarar av hini margfaldu náði Guðs.
11 Um nakar maður tali, *lat hann tala* sum oraklar Guðs; um nakar maður tæni, *lat hann gera tað* sum av førleikanum sum Guð gevur: at Guð í øllum tingum má verða dýrðmettur gjøgnum Jesus Christ, til hvørs veri prís og harradømi um ævir og ævir. Á-mēn.
12 Háttelskaðu, haldið tað ikki undarligt viðvíkjandi hini eldsligu roynslu, sum er *fyri* at royna tykkum, sum um okkurt undarligt ting hendi tykkum:
13 Men fegnist, eftirsum *at* tit eru luttakarar í líðingum Christs; at, tá ið hansara dýrd skal verða opinberað, tit mega verða glaðir eisini við avberari frøi.
14 Um tit verði háðaðir fyri navn Christs, glaðir *eru tit;* tí at andi dýrdarinnar og Guðs hvílir uppiá tykkum: fyri teirra part verður hann ilt talaður um, men fyri tykkara part verður hann dýrðmettur.
15 Men lat ongan av tykkum líða sum ein manndrápari, ella *sum* ein tjóvur, ella *sum* ein illgerðarmaður, ella sum ein sneytidólgur í málevnum annara manna.
16 Tó um *nakar maður líði* sum ein Christin, lat hann ikki skammast; men lat hann dýrðmeta Guð hesa vegna.
17 Tí at tíðin *er komin*, at dómur má byrja við húsi Guðs: og um *hann* fyrst *byrji* við okkum, hvat skal endin *verða* hjá teimum sum lýða ikki gleðiboðskap Guðs?
18 Og um hin rættvísi treyðugligani verði frelstur, hvar skal hin ógudiligi og syndarin birtast?

19 Hvørsvegna lat teir, sum líða samsvarandi við vilja Guðs, líta upp varðveitingina av sínum sálum *til hansara* í at gera væl, sum einum trúføstum Skapara.

KAPITUL 5

HINAR elstu, sum eru tykkara millum, formani eg, sum eisini eri ein elsti, og eitt vitni til líðingar Christs, og eisini ein luttakari í teirri dýrd sum skal verða opinberað:

2 Føðið tað Guðs fylgi sum er tykkara millum, takandi umsjónina *yvir tí,* ikki av tvingsli, men villigani; ikki fyri skitnan vinning, men av fúsum huga;

3 Eiheldur sum verandi harrar yvir *Guðs* arvaluti, men verandi fyridømir fyri fylginum.

4 Og tá ið høvuðs Hirðin skal birtast, skulu tit móttaka dýrdarkrúnu, sum ei følnar burtur.

5 Somuleiðis, tit yngru, undirgevið tykkum sjálvar at teimum eldru. Ja, allir *av tykkum* verið undirgivnir hvør fyri øðrum, og verið klæddir við eyðmjúkleika: tí at Guð stendur hinum dramblátu ímóti, og gevur náði til tey eyðmjúku.

6 Eyðmýkið tykkum tí undir Guðs mektigu hond, *fyri* at hann má upphevja tykkum í røttum tíma:

7 Kastandi alla tykkara sorg uppá hann; tí at hann hevur umsorgan fyri tykkum.

8 Verið edrúir, verið árvaknir; av tí at tykkara mótstandari, djevulin, sum ein ýlandi leyva gongur um, søkjandi hvønn hann kann gloypa:

9 Hvørjum standið ímóti, støðufastir í trúnni, vitandi, at hinar somu líðingar verða fullførdar í brøðrum tykkara, sum eru í heiminum.

10 Men Guð alrar náðar, sum hevur kallað okkum at síni ævigu dýrd við^ Christi Jesusi, eftir at tit hava liðið eina stund, geri tykkum fullkomnar, grundfesti, styrki, støðufesti *tykkum.*

11 Til hansara *veri* dýrd og harradømi um ævir og ævir. Á-měn.

12 Við^ Sīl-vā´-nŭs-i, einum trúføstum bróðuri yvirfyri tykkum, sum eg haldi, havi eg skrivað stutt, formanandi, og vitnandi, at hetta er hin sanna náði Guðs, í hvørji tit standa.

13 *Kirkjan, sum er* í Bábylon, útvøld saman við *tykkum,* letur heilsa tykkum; og *tað ger eisini* Marcus, sonur mín.

14 Heilsið tit hvør øðrum við einum vælvildar-kossi. Friður *veri* við tykkum øllum sum eru í Christi Jesusi. Á-měn.

HIN SEINNI ALMENNI EPISTIL PÆTURS.

KAPITUL 1

SÍMUN Pætur, ein tænari og ein ápostul Jesu Christs, til teirra sum hava lutast líka dýrabæra trúgv við okkum, gjøgnum rættvísi Guðs og Frelsara várs Jesu Christs:

2 Náði og friður veri margfaldað at tykkum, gjøgnum kunnleikan til Guðs, og til Jesu Harra várs,

3 Samsvarandi sum hansara guddómliga kraft hevur givið okkum øll ting sum *hoyra til* lívs og gudiligleika, gjøgnum kunnleikan til hansara sum hevur kallað okkum til dýrdar og dygdar:

4 Hvarviðˆ eru givin okkum ovurhonds mikil og dýrabær lyftir: at viðˆ hesumˇ tit máttu verða luttakarar í hini guddómligu náttúru, havandi komist undan spillingini sum er í heiminum gjøgnum girnd.

5 Og umframt hetta, veitandi allan íðinskap, leggið aftrat tykkara trúgv dygd; og aftrat dygd kunnleika;

6 Og aftrat kunnleika fráhaldsemi; og aftrat fráhaldsemi tolmóð; og aftrat tolmóði gudiligleika;

7 Og aftrat gudiligleika bróðurliga góðsemi; og aftrat bróðurligari góðsemi vælvild.

8 Tí at um hesi ting veri í tykkum, og *eru* ríkilig, gera tey *tykkum at tit skulu* hvørki *verða* ófruktbærir ella fruktaleysir í kunnleikanum til váran Harra Jesus Christ.

9 Men hann, sum fattast hesi ting, er blindur, og kann ei síggja langt burturifrá, og hevur gloymt at hann varð reinskaður frá sínum gomlu syndum.

10 Hvørsvegna tess heldur, brøður, veitið íðinskap at gera tykkara kallan og útveljing viss: tí at um tit geri hesi ting, skulu tit aldri falla:

11 Tí at soleiðis skal inngongd verða tænt til tykkara ríkiligani inn í hitt ævigtvarandi kongadømi várs Harra og Frelsara Jesu Christs.

12 Hvørsvegna eg vil ikki vera misrøkin at seta tykkum altíð í endurminning um hesi ting, tó *at* tit viti *tey,* og veri grundfestir í hinum hjástadda sannleika.

13 Ja, eg haldi tað sømiligt, so leingi sum eg eri í hesum tabernakli, at vekja tykkum upp við at seta *tykkum* í endurminning;

14 Vitandi, at brátt má eg lata *meg* úr *hesum* tabernakli mínum, enntá sum okkara Harri Jesus Christus hevur sýnt mær.

15 Harafturat vil eg stremba *eftir* at tit mega vera førir fyri, eftir mína burturferð, at hava hesi ting altíð í endurminning.

16 Tí at vit hava ikki fylgt snildisligani upphugsaðum fáblum, tá ið vit gjørdu kunn tykkum kraft og komu várs Harra Jesu Christs, men vóru eygnavitnir til hansara hátign.

17 Tí at hann fekk frá Guði Faðirinum heiður og dýrd, tá ið tað kom ein slík rødd til hansara frá hini avbæru dýrd, Hesin er mín háttelskaði Sonur, í hvørjum eg eri væl toknaður.

18 Og hesa rødd, sum kom frá himni, hoyrdu vit, tá ið vit vóru við honum á hinum heilaga fjalli.

19 Vit hava eisini eitt meira fast prophetī-orð; eftir hvørjum tit gera væl at tit gevi gætur, sum eftir einum ljósi sum skínur í einum myrkum plássi, inntil tað lætti fyri deginum, og dagstjørnan rísi í hjørtum tykkara:

20 Vitandi hetta fyrst, at einkið prophetī av skriftini er av nakrari privatari týðing.

21 Tí at prophetīið kom ikki í gamlari tíð viðˆ vilja mans: men heilagir menn Guðs talaðu, *sum teir vórðu* drivnir av Halga Andanum.

KAPITUL 2

MEN tað vóru eisini falskir prophetar millum fólksins, enntá sum tað skulu verða falskir frálærarar tykkara millum, sum loyniliga skulu føra inn heldømiligar ranglærur, enntá avnoktandi Harran sum keypti teir, og føra uppá seg snara oyðing.

2 Og mangir skulu fylgja teirra herviligu vegum; viðˆ grund av hvørjumᵖ sannleikans vegur skal verða ilt talaður um.

3 Og gjøgnum havisjúku skulu teir við falsaðum orðum gera handilsskap úr tykkum: hvørs

dómur nú frá langari tíð drálar ikki, og teirra heldøming durvar ikki.

4 Tí um Guð eirdi ikki einglunum sum syndaðu, men kastaði *teir* niður til helvitis, og gav *teir* yvir í myrkurs ketur, at verða goymdar *fram*at dómi;

5 Og eirdi ikki hinum forna heimi, men frelsti Nóah, hin áttanda *persón,* ein rættvísis-boðara, førandi inn flóðina omanyvir heim hinna ógudiligu;

6 Og broytandi staðir Sodomu og Gō-mōr´-rhŭ yvirí øsku, avdømdi *teir* við eini hvølving, gerandi *teir til* eitt fyridømi teimum sum aftaná skuldu liva ógudiliga;

7 Og útfríaði rættvísa Lot, plágaður við hin gravskitna levnað hinna vondu:

8 (Tí hasin rættvísi maðurin, búgvandi teirra millum, í hoyrn og sjón, plágaði *sína* rættvísu sál frá degi til dags við *teirra* ólógligu gerðir;)

9 Harrin veit hvussu at útfría hinar gudiligu burtur úr freistingum, og at goyma hinar órættvísu *fram*at dómsdeginum at verða revsaðar:

10 Men serliga teir sum ganga eftir kjøtinum í óreinsku-girndini, og vanvirða stjórn. Frekir *teir eru,* eginviljaðir, teir firnast ikki at tala ilt um tignir.

11 Hvar ið einglar, sum eru størri í kraft og mátti, koma ikki við spottandi ákæru ímóti teimum framfyri Harran.

12 Men hesir, eins og náttúrlig, vitleys djór, gjørd til at verða tikin og oydd, tala ilt um tey tingini sum teir skilja ikki; og skulu fullkomiliga glatast í teirra egnu spilling;

13 Og skulu móttaka órættvísis endurgjald, *sum* teir sum telja tað njóting at óryggjast á deginum. Blettir *teir eru* og lýtir, válkandi sær sjálvum við teirra egnu villleiðingum, meðan teir veitslast við tykkum;

14 Havandi eygu full av hordómi, og sum kunnu ikki halda uppat frá synd; tølandi óstøðugar sálir: eitt hjarta teir hava vant við havisjúkum gerðum; bølbiðin børn:

15 Sum hava yvirgivið hin rætta vegin, og eru farnir av leið, fylgjandi vegi Bá´-lāām-s Bŏ´-sŏr-s *sonar,* sum elskaði órættvísis løn;

16 Men varð hartaður fyri sína misgerð: hin málleysi asnin, talandi við mansrødd, aftraði ørskapin hjá prophetinum.

17 Hesir eru keldur uttan vatn, skýggj sum verða rikin við einum harðveðri; til hvørja myrkurs disið er goymt um ævir.

18 Tí at tá ið teir tala mikil, uppblásandi fáfongdar-*orð,* lokka teir, gjøgnum girndir kjøtsins, *gjøgnum mikið* teymaloysi, teir, sum reint høvdu komist undan teimum sum liva í villu.

19 Meðan teir lova teimum frælsi, eru teir sjálvir tænararnir hjá spilling: tí av hvørjum[p] ein maður verður yvirvunnin, av hinum sama verður hann førdur í trældóm.

20 Tí at um, eftir *at* teir hava komist undan dálkingum heimsins, gjøgnum kunnleikan til Harrans og Frelsarans Jesu Christs, teir verða aftur fløktir harí, og yvirvunnir, hin seinni endin verður verri hjá teimum enn byrjanin.

21 Tí at tað hevði verið betri fyri teir ikki at havt kent veg rættvísis, enn, eftir *at* teir hava kent *hann,* at venda frá hinum heilaga boði teimum *varð* fingið.

22 Men tað er hent teimum samsvarandi við hitt sanna orðtak, Hundurin *er* vendur til egnu spýggju sína aftur; og súgvin, sum varð tvigin, til sína veltan í móruni.

KAPITUL 3

HENDA annan epistil, háttelskaðu, skrivi eg nú til tykkara; í *báðum* hvørjum eg veki upp tykkara reinu hugar við brúki av endurminning:

2 At tit mega vera minnugir um orðini sum vórðu talaði áður av hinum heilagu prophetum, og um boðið hjá okkum, ápostlum Harrans og Frelsarans:

3 Vitandi hetta fyrst, at tað skulu koma í hinum síðstu døgum spottarar, gangandi eftir sínum egnu lystum,

4 Og sigandi, Hvar er fyrijáttanin um hansara komu? tí at síðan fedrarnir sovnaðu, halda øll ting áfram sum *tey vóru* frá byrjanini av skapanini.

5 Tí at hetta teir eru villigani óvitandi um, at við Guðs orði himnarnir vórðu í fordum, og jørðin, standandi út úr vatninum og í vatninum:

6 Við hvørjum heimurin, sum tá var, verðandi yvirfloymdur við vatni, glataðist:

7 Men himnarnir og jørðin, sum nú eru, verða við hinum sama orði hildin í varðveitslu, goymd at eldi ímóti deginum av dómi og glatan av ógudiligum monnum.

8 Men, háttelskaðu, verið ikki óvitandi um hetta ēina ting, at ēin dagur *er* hjá Harranum sum túsund ár, og túsund ár sum ēin dagur.

9 Harrin er ikki seinførur viðvíkjandi síni fyrijáttan, sum summir menn telja seinføri; men er langmóðigur mótvegis okkum, ikki villigur at nakar skuldi glatast, men at øll skuldu komið til umvendingar.

10 Men dagur Harrans vil koma sum ein tjóvur á nátt; í hvørjum himnarnir skulu ganga undir við einum miklum braki, og frumevnini skulu smelta við brennandi hita, jørðin eisini og tey verkini, sum á henni eru, skulu verða brend upp.

11 *Við tað* tá *at* øll hesi tingini skulu verða upployst, hvørsháttar *persónar* áttu tit at vera í *allari* heilagari atferð og gudiligleika,

12 Væntandi eftir og skundandi at komuni av degi Guðs, í hvørjum himnarnir, eldur verandi í *teimum,* skulu verða upploystir, og frumevnini skulu smelta við brennandi hita?

13 Hóast hetta vit, samsvarandi við hansara fyrijáttan, vænta eftir nýggjum himnum og eini nýggjari jørð, hvarí rættvísi býr.

14 Hvørsvegna, háttelskaðu, við tað at tit vænta eftir slíkum tingum, verið ídnir, at tit mega verða funnir av honum í friði, uttan blett, og ólastandi.

15 Og roknið, *at* langmóð várs Harra *er* frelsa; enntá sum okkara háttelskaði bróðir, Paulus, eisini samsvarandi við vísdómin, honum givin, hevur skrivað tykkum;

16 Sum eisini í øllum *sínum* epistlum, talandi í teimum um hesi ting; í hvørjum eru summi ting torfør at verða skilt, hvørji teir, sum eru ólærdir og óstøðugir, brongla, eins og *teir gera* eisini *við* hinar skriftirnar, sær sjálvum til oyðileggingar.

17 Tit tessvegna, háttelskaðu, við tað at tit vita *hesi ting* frammanundan, verið varnir, at ikki tit eisini, verðandi leiddir burtur við villfaring hinna vondu, falli frá tykkara egna støðufastleika.

18 Men vaksið í náði, og *í* kunnleikanum til váran Harra og Frelsara Jesus Christ. Til hansara *veri* dýrd bæði nú og um ævir. Á-měn.

HIN FYRSTI ALMENNI EPISTIL
JÓHANNESAR.

KAPITUL 1

TAÐ, sum var frá byrjanini, sum vit hava hoyrt, sum vit hava sæð við eygum okkara, sum vit hava hugt uppá, og okkara hendur hava handfarið, av Orði lívsins;
2 (Tí at lívið varð eyðsýnað, og vit hava sæð *tað,* og bera vitnisburð, og sýna tykkum hitt æviga lívið, sum var hjá Faðirinum, og varð tilkennargivið okkum;)
3 Tað, sum vit hava sæð og hoyrt, kunngera vit tykkum, at tit eisini mega hava samfelag við okkum: og sanniliga, okkara samfelag *er* við Faðirin, og við Son hansara Jesus Christ.
4 Og hesi ting skriva vit tykkum, at tykkara gleði má verða full.
5 Hesin tá er boðskapurin sum vit hava hoyrt av honum, og kunngera tykkum, at Guð er ljós, og í honum er als einkið myrkur.
6 Um vit siga, at vit hava samfelag við hann, og ganga í myrkri, *so* lúgva vit, og gera ikki sannleikan:
7 Men um vit ganga í ljósinum, eins og hann er í ljósinum, *so* hava vit samfelag hvør við annan, og blóð Jesu Christs, Sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd.
8 Um vit siga, at vit onga synd hava, *so* svíkja vit okkum sjálv, og sannleikin er ikki í okkum.
9 Um vit játta okkara syndir, hann er trúfastur og rættvísur at fyrigeva okkum *okkara* syndir, og at reinsa okkum frá allari órættvísi.
10 Um vit siga, at vit hava ikki syndað, *so* gera vit hann *til* ein lygnara, og orð hansara er ikki í okkum.

KAPITUL 2

LÍTLU børn míni, hesi ting skrivi eg tykkum, at tit syndi ikki. Og um nakar maður syndi, vit hava ein sakførara hjá Faðirinum, Jesus Christ hin rættvísa:
2 Og hann er fyribøtingin fyri okkara syndir: og ikki fyri okkara einans, men eisini fyri *syndirnar hjá* øllum heiminum.
3 Og herav vita vit, at vit kenna hann, um vit halda boð˘ hansara.
4 Hann, sum sigur, Eg kenni hann, og heldur ikki boðini hjá honum, er ein lygnari, og sannleikin er ikki í honum.
5 Men hvørið so heldur orð hansara, í honum sanniliga er Guðs kærleiki fullkomnaður: herav vita vit, at vit eru í honum.
6 Hann, ið sigur, *at* hann verður *verandi* í honum, átti sjálvur eisini soleiðis at ganga, enntá eins og hann gekk.
7 Brøður, eg skrivi tykkum einkið nýtt boð, men eitt gamalt boð sum tit høvdu frá byrjanini. Tað gamla boðið er tað orðið sum tit hava hoyrt frá byrjanini.
8 Aftur, eitt nýtt boð skrivi eg tykkum, hvat ting er satt í honum og í tykkum: tí at myrkrið er umliðið, og tað sanna ljósið nú skínur.
9 Hann, ið sigur, *at* hann er í ljósinum, og hatar bróður sín, er í myrkri enntá inntil nú.
10 Hann, ið elskar bróður sín, verður *verandi* í ljósinum, og tað er einkið føri av snáving í honum.
11 Men hann, ið hatar bróður sín, er í myrkri, og gongur í myrkri, og veit ikki hvagar hann fer, av tí at myrkur hevur blindað eygu hansara.
12 Eg skrivi tykkum, lítlu børn, av tí at tykkara syndir eru fyrigivnar tykkum fyri navns hansara skuld.
13 Eg skrivi tykkum, fedrar, av tí at tit hava kent hann *sum er* frá byrjanini. Eg skrivi tykkum, ungu

menn, av tí at tit hava vunnið yvir hinum vonda. Eg skrivi tykkum, lítlu børn, av tí at tit hava kent Faðirin.

14 Eg havi skrivað tykkum, fedrar, av tí at tit hava kent hann *sum er* frá byrjanini. Eg havi skrivað tykkum, ungu menn, av tí at tit eru sterkir, og Guðs orð verður *verandi* í tykkum, og tit hava vunnið yvir hinum vonda.

15 Elskið ikki heimin, eiheldur tey tingini *sum eru* í heiminum. Um nakar maður elski heimin, Faðirsins kærleiki er ikki í honum.

16 Tí at alt sum *er* í heiminum, kjøtsins lyst, og eygnanna lyst, og lívsins dramblæti, er ikki av Faðirinum, men er av heiminum.

17 Og heimurin gongur undir, og lyst hansara: men hann, ið ger vilja Guðs, verður um ævir.

18 Lítlu børn, tað er hin síðsti tímin: og eins og tit hava hoyrt, at ǎn´-tī-chrīst-ūs skal koma, enntá nú eru tað mangir ǎn´-tī-chrīst-ǎr; hvarav vita vit, at tað er hin síðsti tímin.

19 Teir fóru út frá okkum, men teir vóru ikki av okkum; tí at um teir høvdu verið av okkum, vildu teir *uttan iva* havt hildið fram við okkum: men *teir fóru út, fyri* at teir máttu verða gjørdir eyðsýndir, at teir vóru ikki allir av okkum.

20 Men tit hava eina smyrjing frá Hinum Heilaga, og tit vita øll ting.

21 Eg havi ikki skrivað tykkum, av tí at tit vita ikki sannleikan, men av tí at tit vita hann, og at eingin lygn er av sannleikanum.

22 Hvør er ein lygnari uttan hann, sum avnoktar, at Jesus er Christus˘? Hann er ǎn´-tī-chrīst-ūs, sum avnoktar Faðirin og Sonin.

23 Hvørsumhelst *ið* avnoktar Sonin, hin sami hevur ikki Faðirin: [*men*] *hann, sum viðurkennir Sonin, hevur Faðirin eisini.*

24 Latið tað tí verða *verandi* í tykkum, sum tit hava hoyrt frá byrjanini. Um tað, sum tit hava hoyrt frá byrjanini, skal verða verandi í tykkum, skulu tit eisini halda áfram í Syninum, og í Faðirinum.

25 Og hetta er fyrijáttanin, sum hann hevur fyrijáttað okkum, *enntá* ævigt lív.

26 Hesi *ting* havi eg skrivað tykkum viðvíkjandi teimum sum tøla tykkum.

27 Men salvingin, sum tit hava fingið frá honum, verður *verandi* í tykkum, og tykkum tarvast ikki, at nakar maður læri tykkum: men eins og hin sama salvingin lærir tykkum um øll ting, og er sannleiki, og er eingin lygn, og enntá eins og hon hevur lært tykkum, skulu tit verða *verandi* í honum.

28 Og nú, lítlu børn, verðið *verandi* í honum; at, tá ið hann skal birtast, vit mega hava treysti, og ikki skammast frammi fyri honum við hansara komu.

29 Um tit vita, at hann er rættvísur, *so* vita tit, at hvør tann, sum ger rættvísi, er føddur av honum.

KAPITUL 3

SÍGGIÐ hvørsháttar kærleika Faðirin hevur skonkt uppá okkum, at vit skuldu vera kallaðir synir Guðs: tí kennir heimurin okkum ikki, av tí at hann kendi ikki hann.

2 Háttelskaðu, nú eru vit synir Guðs, og tað birtist ikki enn hvat vit skulu verða: men vit vita, at tá ið hann skal birtast, skulu vit verða líkir honum; tí at vit skulu síggja hann sum hann er.

3 Og hvør maður, ið hevur hesa vón til hansara, skírgar seg sjálvan, enntá eins og hann er skírur.

4 Hvørsumhelst *ið* fremur synd, misbrýtur eisini lógina: tí at synd er misbrótingin av lógini.

5 Og tit vita, at hann varð tilkennargivin til at taka burtur okkara syndir; og í honum er eingin synd.

6 Hvørsumhelst *ið* verður *verandi* í honum, syndar ikki: hvørsumhelst *ið* syndar, hevur ikki sæð hann, eiheldur kent hann.

7 Lítlu børn, latið ongan mann villleiða tykkum: hann, sum ger rættvísi, er rættvísur, enntá eins og hann er rættvísur.

8 Hann, ið fremur synd, er av djevlinum; tí at djevulin syndar frá upphavi. Fyri hetta endamál varð Sonur Guðs tilkennargivin, at hann mátti oyðileggja verkini hjá djevlinum.

9 Hvørsumhelst *ið* er føddur av Guði, fremur ikki synd; tí at hansara sáð verður verandi í honum: og hann kann ikki synda, av tí at hann er føddur av Guði.

10 Í hesum eru børn Guðs eyðsýn, og børn djevulsins: hvørsumhelst *ið* ger ikki rættvísi, er ikki av Guði, eiheldur hann sum elskar ikki bróður sín.

11 Tí at hetta er boðskapurin, sum tit hoyrdu frá byrjanini, at vit skuldu elska hvør annan.

12 Ikki eins og Cáin, *sum* var av hinum vonda, og vó bróður sín. Og hvørsvegna vó hann hann? Av tí at hans egnu verk vóru ónd, og bróðurs hansara rættvís.

13 Undrist ikki, brøður mínir, um heimurin hati tykkum.

14 Vit vita, at vit eru farnir yvirum frá deyða til lívs, av tí at vit elska brøðurnar. Hann, ið elskar ikki bróður *sín,* verður *verandi* í deyða.

15 Hvørsumhelst *ið* hatar bróður sín, er ein myrðari: og tit vita, at eingin myrðari hevur ævigt lív verandi í sær.

16 Herav varnast vit kærleika *Guðs,* av tí at hann legði niður sítt lív fyri okkum: og vit áttu at leggja niður *okkara* lív fyri brøðurnar.

17 Men hvø*ri*ðso hevur tað góða av hesum heimi, og sær bróður sín hava tørv, og letur aftur sínar innangoymslur *av várkunn* fyri honum, hvussu býr kærleiki Guðs í honum?

18 Míni lítlu børn, latum okkum ikki elska í orði, eiheldur í tungu; men í gerð og í sannleika.

19 Og herav vita vit, at vit eru av sannleikanum, og skulu vissa okkara hjørtu frammi fyri honum.

20 Tí at um okkara hjarta fordømi okkum, Guð er størri enn hjarta okkara, og kennir øll ting.

21 Háttelskaðu, um okkara hjarta fordømi okkum ikki, *tá* hava vit treysti mótvegis Guði.

22 Og hvatsumhelst *ið* vit umbiðja, móttaka vit av honum, av tí at vit halda boðini hjá honum, og gera tey ting sum eru toknandi í eygsjón hansara.

23 Og hetta er boðið hjá honum, At vit skuldu trúgva á navn Sonar hansara, Jesu Christs, og elska hvør annan, eins og hann gav okkum boð.

24 Og hann, ið heldur boðini hjá honum, býr í honum, og hann í honum. Og herav vita vit, at hann verður *verandi* í okkum, av Andanum sum hann hevur givið okkum.

KAPITUL 4

HÁTTELSKAÐU, trúgvið ikki hvørjum anda, men roynið andarnar, hvørt teir eru av Guði: tí at mangir falskir prophetar eru farnir út í heimin.

2 Herav kenna tit Anda Guðs: Hvør andi, sum játtar, at Jesus Christus er komin í kjøtinum, er av Guði:

3 Og hvør andi, sum játtar ikki, at Jesus Christus er komin í kjøtinum, er ikki av Guði: og hetta er hasin *andi* ǎn´-tī-chrīst-s, um hvønn tit hava hoyrt, at hann skuldi koma; og enntá nú longu er hann í heiminum.

4 Tit eru av Guði, lítlu børn, og hava vunnið yvir teimum: tí at

større er hann sum er í tykkum, enn hann sum er í heiminum.

5 Teir eru av heiminum: tí tala teir av heiminum, og heimurin hoyrir teir.

6 Vit eru av Guði: hann, sum kennir Guð, hoyrir okkum; hann, sum er ikki av Guði, hoyrir ikki okkum. Herav kenna vit sannleikans anda, og villunnar anda.

7 Háttelskaðu, latum okkum elska hvør annan: tí at kærleiki er av Guði; og hvør tann, ið elskar, er føddur av Guði, og kennir Guð.

8 Hann, ið elskar ikki, kennir ikki Guð; tí at Guð er kærleiki.

9 Í hesum varð eyðsýnaður Guðs kærleiki mótvegis okkum, av tí at Guð sendi sín ēingitna Son inn í heimin, at vit máttu liva gjøgnum hann.

10 Herí er kærleiki, ikki at vit elskaðu Guð, men at hann elskaði okkum, og sendi sín Son *til at vera* fyribøtingin fyri okkara syndir.

11 Háttelskaðu, um Guð soleiðis elskaði okkum, áttu vit eisini at elska hvør annan.

12 Eingin maður hevur sæð Guð á nøkrum sinni. Um vit elska hvør annan, dvølist Guð í okkum, og hansara kærleiki er fullkomnaður í okkum.

13 Herav vita vit, at vit dvøljast í honum, og hann í okkum, av tí at hann hevur givið okkum av sínum Anda.

14 Og vit hava sæð og vitna, at Faðirin sendi Sonin *til at vera* Frelsari heimsins.

15 Hvørsumhelst *ið* skal játta, at Jesus er Sonur Guðs, Guð býr í honum, og hann í Guði.

16 Og vit hava kent og trúð tí kærleika sum Guð hevur til okkara. Guð er kærleiki; og hann, sum býr í kærleika, býr í Guði, og Guð í honum.

17 Herí er okkara kærleiki gjørdur fullkomin, at vit mega hava dirvi á dómsdeginum: av tí at eins og hann er, soleiðis eru vit í hesum heimi.

18 Tað er eingin ótti í kærleika; men fullkomin kærleiki kastar út ótta: av tí at ótti hevur kvøl. Hann, ið óttast, er ikki gjørdur fullkomin í kærleika.

19 Vit elska hann, av tí at hann elskaði okkum fyrst.

20 Um ein maður sigi, Eg elski Guð, og hatar bróður sín, hann er ein lygnari: tí at hann, ið elskar ikki bróður sín sum hann hevur sæð, hvussu kann hann elska Guð sum hann hevur ikki sæð?

21 Og hetta boðið hava vit frá honum, At hann, ið elskar Guð, elski bróður sín eisini.

KAPITUL 5

HVØRSUMHELST *ið* trýr, at Jesus er Christus, er føddur av Guði: og hvør tann, ið elskar hann sum gat, elskar eisini hann sum er gitin av honum.

2 Av hesum vita vit, at vit elska børn Guðs, tá ið vit elska Guð, og halda boðini hjá honum.

3 Tí at hetta er kærleikin til Guðs, at vit halda boð hansara: og hansara boð eru ikki svárlig.

4 Tí at hvatsumhelst *ið* er føtt av Guði, vinnur yvir heiminum: og hetta er sigurin, sum vinnur yvir heiminum, *enntá* trúgv okkara.

5 Hvør er hann, ið vinnur yvir heiminum, uttan hann ið trýr, at Jesus er Sonur Guðs?

6 Hetta er hann, sum kom við vatni og blóði, *enntá* Jesus Christus; ikki við vatni einans, men við vatni og blóði. Og tað er Andin sum ber vitnisburð, tí at Andin er sannleiki.

7 Tí at tað eru tríggir, sum geva frágreiðing í himni, Faðirin, Orðið, og Halgi Andin: og hesir tríggir eru ēitt.

8 Og tað eru trý, sum bera vitni á jørð, Andin, og vatnið, og blóðið: og hesi trý semjast í ēitt.

9 Um vit taka ímóti vitnisburði manna, *so* er Guðs vitnisburður størri: tí at hetta er Guðs vitnisburður sum hann hevur vitnað um Son sín.

10 Hann, sum trýr á Son Guðs, hevur vitnisburðin í sær sjálvum: hann, sum trýr ikki Guði, hevur gjørt hann *til* ein lygnara; av tí at hann trýr ikki teirri frágreiðing sum Guð gav um Son sín.

11 Og hetta er frágreiðingin, at Guð hevur givið okkum ævigt lív, og hetta lívið er í Syni hansara.

12 Hann, ið hevur Sonin, hevur lív; *og* hann, ið hevur ikki Guðs Son, hevur ikki lív.

13 Hesi ting havi eg skrivað tykkum, sum trúgva á navn Guðs Sonar; at tit mega vita, at tit hava ævigt lív, og at tit mega trúgva á navn Guðs Sonar.

14 Og hetta er tað treystið, sum vit hava á hann, at um vit umbiðja nakað ting samsvarandi við vilja hansara, hann hoyrir okkum:

15 Og um vit vita, at hann hoyri okkum, hvatsumhelst *ið* vit umbiðja, *so* vita vit, at vit hava tær umbønir sum vit tráaðu av honum.

16 Um nakar maður síggi bróður sín synda eina synd *sum er* ikki til deyða, hann skal umbiðja, og hann skal geva honum lív fyri teir sum synda ikki til deyða. Til er synd til deyða: eg sigi ikki, at hann skal biðja fyri henni.

17 Øll órættvísi er synd: og til er synd — ikki til deyða.

18 Vit vita, at hvørsumhelst *ið* er føddur av Guði, syndar ikki; men hann, sum er gitin av Guði, varðar seg sjálvan, og hin vondi nemur hann ikki.

19 *Og* vit vita, at vit eru av Guði, og allur heimurin liggur í vondsku.

20 Og vit vita, at Guðs Sonur er komin, og hevur givið okkum eina fatan, at vit mega kenna hann sum er sannur, og vit eru í honum sum er sannur, *enntá* í hansara Syni Jesusi Christi. Hesin er hin sanni Guð, og ævigt lív.

21 Lítlu børn, haldið tykkum frá avgudum. Á-měn.

HIN ANNAR EPISTIL
JÓHANNESAR.

HIN elsti til hina útvaldu frú og børn hennara, sum eg elski í sannleikanum; og ikki eg einans, men eisini øll tey sum hava kent sannleikan;

2 Fyri sannleikans skuld, sum býr í okkum, og skal vera við okkum um ævir.

3 Náði veri við tykkum, miskunn, *og* friður, frá Guði Faðirinum, og frá Harranum Jesusi Christi, Syni Faðirsins, í sannleika og kærleika.

4 Eg fegnaðist mikilliga, at eg fann av børnum tínum, gangandi í sannleika, eins og vit hava fingið eitt boð frá Faðirinum.

5 Og nú bøni eg teg, frú, ikki sum um eg skrivaði eitt nýtt boð til tín, men tað sum vit høvdu frá byrjanini, at vit elski hvør annan.

6 Og hetta er kærleiki, at vit gangi eftir boðum hansara. Hetta er boðið, At, eins og tit hava hoyrt frá byrjanini, skuldu tit ganga í tí.

7 Tí at mangir villleiðarar eru farnir inn í heimin, sum játta ikki, at Jesus Christus er komin í kjøtinum. Hetta er ein villleiðari og ein ăn'-tī-chrīst-ŭs.

8 Hyggið um tykkum sjálvar, at vit missi ikki tey ting sum vit hava virkað, men at vit móttaki fult endurgjald.
9 Hvørsumhelst *ið* misbrýtur, og verður ikki *verandi* í Guðslæru Christs, hevur ikki Guð. Hann, sum verður *verandi* í Guðslæru Christs, hann hevur bæði Faðirin og Sonin.
10 Um tað komi nakar til tykkara, og komi ikki við hesi Guðslæru, takið ikki ímóti honum inn í hús *tykkara,* eiheldur bjóðið honum Guðs byr:
11 Tí at hann, sum býður honum Guðs byr, er luttakari í hans illu gerðum.
12 Havandi mong ting at skriva tykkum, vildi eg ikki *skriva* við pappíri og blekki: men eg líti *á* at koma til tykkara, og tala andlit til andlits, at okkara fagnaður má verða fullur.
13 Børnini hjá tíni útvaldu systur lata heilsa tær. Á-měn.

HIN TRIÐJI EPISTIL
JÓHANNESAR.

HIN elsti til hin háttelskaða Gâĭ-ŭs, sum eg elski í sannleikanum.
2 Háttelskaði, eg ynski framum øll ting, at tú mást framganga og vera við heilsu, enntá sum sál tín framgongur.
3 Tí at eg frøddi *meg* stórliga, tá ið brøðurnir komu og vitnaðu um sannleikan sum er í tær, enntá sum tú gongurt í sannleikanum.
4 Eg havi onga størri frøi enn at hoyra, at børn míni ganga í sannleika.
5 Háttelskaði, tú gert trúfastliga hvatsumhelst tú gert mót*vegis* brøðrunum, og mót*vegis* fremmandum;
6 Sum hava borið vitnisburð um tína vælvild frammi fyri kirkjuni: hvørjar, um tú føri áfram á teirra ferð eftir einum gudiligum máta, skalt tú gera væl:
7 Av tí at fyri navns hansara skuld fóru teir út, takandi einkið av Heidningunum.
8 Vit, tessvegna, áttu at taka ímóti slíkum, at vit máttu verið felags hjálparar fyri sannleikanum.
9 Eg skrivaði kirkjuni: men Dĭ-ô-trĕ-phĕs, sum elskar at hava hina fremstu *støðu* teirra millum, tekur ikki ímóti okkum.
10 Hvørsvegna, um eg komi, vil eg minnast hansara gerðir sum hann ger, prátandi ímóti okkum við illviljasomum orðum: og ikki nøgdur harvið, eiheldur sjálvur tekur hann ímóti brøðrunum, og noktar teimum sum vildu, og kastar *teir* út úr kirkjuni.
11 Háttelskaði, fylg ikki tí sum er ilt, men tí sum er gott. Hann, ið ger gott, er av Guði: men hann, ið ger ilt, hevur ikki sæð Guð.
12 Dê-mĕ-trĭ-ŭs hevur góða frágreiðing av øllum *monnum,* og av sannleikanum sjálvum: ja, og vit *eisini* geva frágreiðing; og tit vita, at okkara frágreiðing er sonn.
13 Eg hevði mong ting at skriva, men eg vil ikki við blekki og penni skriva tær:
14 Men eg líti *á, at* eg skal brátt sjá teg, og vit skulu tala andlit til andlits. Friður *veri* til tín. *Okkara* vinir lata heilsa tær. Heilsa vinunum við navni.

HIN ALMENNI EPISTIL
JUDASAR.

JUDAS, tænari Jesu Christs, og bróðir Jákobs, til teirra sum eru halgaðir av Guði Faðirinum, og varðveittir í Jesusi Christi, *og* kallaðir:

2 Miskunn at tykkum, og friður, og kærleiki, veri margfaldað.

3 Háttelskaðu, tá ið eg veitti allan íðinskap at skriva tykkum um hina felags frelsu, var tað neyðturviligt hjá mær at skriva tykkum, og formana *tykkum,* at tit skuldu álvarsamligani stríða fyri trúnni, sum varð ēinaferð fingin teimum heilagu.

4 Tí at tað eru ávísir menn, skridnir inn óvarnandi, sum vórðu áður frá gamlari *tíð* útnevndir til hesa dómfelling, ógudiligir menn, umgerandi náði Guðs várs yvirí skendsku, og avnoktandi hin ēinasta Harra Guð, og váran Harra Jesus Christ.

5 Eg vil tí seta tykkum í endurminning, tó *at* tit ēinaferð vitstu hetta, hvussu ið Harrin, havandi frelst fólkið út úr Egyptalandi, aftaná oyddi tey sum trúðu ikki.

6 Og teir einglarnar, sum hildu ikki sína fyrstu støðu, men yvirgóvu sín egna bústað, hevur hann goymt í ævigtvarandi ketum undir myrkri, *fram*at dómi hins mikla dags.

7 Enntá sum Sodoma og Gōmōr´-rhă, og staðirnir íkring teir á líkan hátt, gevandi seg sjálvar yvir til siðloysis, og farandi eftir fremmandum kjøti, eru settir fram til eitt fyridømi, líðandi revsidómin av ævigum eldi.

8 Líkaleiðis eisini hesir *skitnu* droymararnir óreinka kjøtið, vanvirða harradømi, og tala ilt um tignir.

9 Tó høvuðseingilin Michael, tá ið *hann* stríddi við djevulin, skifti hann orð um Móse likam, tordi ei føra ímóti honum eina háðandi ákæru, men segði, Harrin harti teg.

10 Men hesir tala ilt um tey ting sum teir kenna ikki: men tað, *sum* teir kenna náttúrligani, eins og vitleys djór, í teimum tingunum spilla teir seg sjálvar.

11 Vei teimum! tí at teir hava gingið á vegi Cáins, og runnu grádigani eftir villfaring Bá´-lāām-s fyri endurgjald, og glataðust í andmæling Cora.

12 Hesir eru blettir í tykkara vælvildar-festum, tá ið teir festa við tykkum, nørandi seg sjálvar uttan ótta: skýggj˘ *teir eru,* uttan vatn, drivnir umkring av vindum; trø, hvørs ávøkstur følnar, uttan ávøkst, tværreisur deyðir, slitnir upp við røturnar;

13 Øðisligar sævaraldur, froðandi út teirra egnu skomm; reikandi stjørnur, til hvørja er avlagdur myrkursins svartleiki um ævir.

14 Og E´-nŏch eisini, hin sjeyndi frá Adami, prophēteraði um hesar, sigandi, Sí, Harrin kemur við tíggju túsundum av sínum heilagu,

15 Til at útinna dóm uppá allar, og at sannføra allar sum eru ógudiligir teirra millum um allar teirra ógudiligu gerðir sum teir hava ógudiligani framt, og um allar teirra hørðu *talur* sum ógudiligir syndarar hava talað ímóti honum.

16 Hesir eru knarrarar, klagarar, gangandi eftir teirra egnu lystum; og teirra muður talar mikil uppblásandi *orð,* havandi persónar manna í metum uppá grund av frama.

17 Men, háttelskaðu, minnist tit orðini sum vórðu talaði áður

av ápostlum várs Harra Jesu Christs;
18 Hvussu ið teir søgdu tykkum, *at* tað skuldu verða spottarar í hini síðstu tíð, sum skuldu ganga eftir teirra egnu ógudiligu lystum.
19 Hesir veri teir sum atskilja seg sjálvar, sansaligir, ei havandi Andan.
20 Men tit, háttelskaðu, byggjandi upp tykkum sjálvar á tykkara mest heilagu trúgv, biðjandi í Halga Andanum,
21 Haldið tykkum sjálvar í kærleika Guðs, væntandi eftir miskunn várs Harra Jesu Christs til ævigs lívs.
22 Og við summum havið várkunn, gerandi mun:
23 Og aðrar frelsið við ótta, hálandi *teir* út úr eldinum; hatandi enntá klæðið, blettað av kjøtinum.
24 Nú, honum sum er førur fyri at varða tykkum frá at falla, og at seta *tykkum* fram feilafríar frammi fyri nærveruni av síni dýrd við ovurhonds fagnaði,
25 Til hins ēinasta vísa Guðs várs Frelsara, *veri* dýrd og hátign, harradømi og máttur, bæði nú og ævir. Á-mēn.

OPINBERING

ST. JÓHANNESAR HINS GUÐSLÍKA.

KAPITUL 1

OPINBERING Jesu Christs, sum Guð gav honum, at sýna tænarum sínum ting sum mugu brátt bera á; og hann sendi og uppmálaði *tað* við sínum eingli at tænara sínum Jóhannesi:
2 Sum gav frágreiðing um Guðs orð, og um Jesu Christī vitnisburð, og um øll ting sum hann sá.
3 Vælsignaður *er* hann sum lesur, og teir sum hoyra orðini av hesum prophetīi, og varðveita tey tingini sum eru skrivað harí: tí at tíðin *er* fyri hond.
4 JÓHANNES til hinar sjey kirkjur, sum eru í Asiu: náði *veri* at tykkum, og friður, frá honum sum er, og sum var, og sum koma skal; og frá teimum sjey Andunum sum eru frammanfyri hásæti hansara;
5 Og frá Jesusi Christi, *sum er* hitt trúfasta vitni, *og* hin frumgitni av teimum deyðu, og prinsur konga jarðarinnar. Honum sum elskaði okkum, og tvó okkum frá okkara syndum í sínum egna blóði,
6 Og hevur gjørt okkum *til* kongar og prestar yvirfyri Guði og Faðir hansara; til hansara *veri* dýrd og harradømi um ævir og ævir. Á-mēn.
7 Sí, hann kemur við skýggjum; og hvørt eyga skal sjá hann, og teir *eisini* sum gataðu hann: og allar ættargreinir jarðarinnar skulu gráta uppá grund av honum. Enntá so, Á-mēn.
8 Eg eri Alpha og Omega, byrjanin og endingin, sigur Harrin, sum er, og sum var, og sum koma skal, hin Almáttugi.
9 Eg, Jóhannes, sum eisini eri tykkara bróðir, og lagsmaður í trongslu, og í kongadømi og tolmóði Jesu Christs, var á oynni sum er kallað Patmos, fyri Guðs orð, og fyri Jesu Christī vitnisburð.
10 Eg var í Andanum á Harrans degi, og hoyrdi aftanfyri meg eina mikla rødd, sum av einum lúðri,

11 Sigandi, Eg eri Alpha og Omega, hin fyrsti og hin síðsti: og, Tað, *sum* tú sært, skriva í eina bók, og send *tað* til hinar sjey kirkjur, sum eru í Asiu; til Ē´-phĕ-sŭs, og til Smyrnu, og til Pĕr´-gă-mŏs, og til Thý-ă-tí´-rŭ, og til Săr´-dĭs, og til Philadelphiu, og til Lâ-ŏ-dĭ-cē´-ŭ.

12 Og eg vendi *mær* til *tess* at sjá røddina sum talaði við meg. Og, verandi vendur, sá eg sjey gyltar ljósastakar;

13 Og í miðju hinna sjey ljósastaka *ēin,* líkur Menniskjusyninum, klæddur við einum klæði niður til fóts, og gyrdur um bróstini við einum gyltum gyrðli.

14 Hans høvur og hár˘ *vóru* hvít sum ull, so hvít sum snjó; og hans eygu *vóru* sum ein flamma av eldi;

15 Og hansara føtur líkir fínum kopari, sum um teir brendu í einum bræðsluovni; og hans rødd sum ljóðið av mongum vøtnum.

16 Og hann hevði í síni høgru hond sjey stjørnur: og út úr hans munni gekk eitt hvast, tvíeggjað svørð: og hans ásjón *var* sum sólin skínur í styrki síni.

17 Og tá ið eg sá hann, fell eg við hansara føtur sum deyður. Og hann legði sína høgru hond uppá meg, sigandi við meg, Óttast ikki; eg eri hin fyrsti og hin síðsti:

18 *Eg eri* hann sum livir, og var deyður; og sí, eg eri livandi um ævirmeir, Ă-mĕn; og havi lyklar helvitis og deyðans.

19 Skriva tey tingini sum tú hevurt sæð, og tey tingini sum eru, og tey tingini sum skulu verða hereftir;

20 Loyndardómur hinna sjey stjarna sum tú sást í høgru hond míni, og hinna sjey gyltu ljósastaka. Hinar sjey stjørnur eru einglarnir hjá hinum sjey kirkjum: og hinir sjey ljósastakar, sum tú sást, eru hinar sjey kirkjur.

KAPITUL 2

EINGLINUM hjá kirkjuni í Ē´-phĕ-sŭs skriva; Hesi ting sigur hann sum heldur hinum sjey stjørnum í síni høgru hond, sum gongur í miðju hinna sjey gyltu ljósastaka;

2 Eg veit verk tíni, og strev títt, og tolmóð tína, og hvussu tú orkart ei *at* bera teir sum eru óndir: og tú hevurt roynt teir sum siga, *at* teir eru ápostlar, og eru ikki, og hevurt funnið teir lygnarar:

3 Og hevurt borið, og hevurt tolmóð, og fyri navns míns skuld hevurt strevast, og hevurt ikki lúgvast.

4 Hóast hetta, eg havi *eitthvørt* ímóti tær, av tí at tú hevurt yvirgivið tín fyrsta kærleika.

5 Minst til, tessvegna, hvaðani frá tú ert fallin, og vend um, og ger hini fyrstu verk; annars vil eg koma til tín snarliga, og vil burtflyta ljósastaka tín út úr plássi sínum, uttan tú vendi um.

6 Men hetta tú hevurt, at tú hatart gerðir Nĭ-cŏ-lâ-ĭt´-anna, sum eg eisini hati.

7 Hann sum hevur oyra, lat hann hoyra hvat Andin sigur við kirkjurnar; Til hansara, sum yvirvinnur, vil eg geva at eta av lívsins træi, sum er í miðjum pāradísi Guðs.

8 Og einglinum hjá kirkjuni í Smyrnu skriva; Hesi ting sigur hin fyrsti og hin síðsti, sum var deyður, og er livandi;

9 Eg veit verk tíni, og trongslu, og fátækdóm, (men tú ert ríkur), og *eg veit* Guðsspottan teirra sum siga *at* teir eru Jødar, og eru ikki, men *eru* sýnagoga Satans.

10 Óttast eingi av teimum tingunum sum tú skalt líða: sí, djevulin skal kasta *summar* av tykkum inn í fongsul, at tit mega verða royndir; og tit skulu hava trongslu tíggju dagar: vert tú trúfastur til deyða, og eg vil geva tær eina lívsins krúnu.

11 Hann sum hevur oyra, lat hann hoyra hvat Andin sigur við kirkjurnar; Hann, sum yvirvinnur, skal ikki verða grandaður av hinum øðrum deyðanum.

12 Og til eingilin hjá kirkjuni í Pĕr´-gă-mŏs skriva; Hesi ting sigur hann sum hevur tað hvassa svørðið við tveimum eggjum;

13 Eg veit verk tíni, og hvar tú býrt, *enntá* har *sum* sæti Satans *er:* og tú heldurt fast mítt navn, og hevurt ikki avnoktað trúgv mína, enntá í teim døgum, í hvørjum Ăn´-tĭ-pās *var* mín trúfasti martýrur, sum varð vigin tykkara millum, har Satan býr.

14 Men eg havi nøkur fá ting ímóti tær, av tí at tú hevurt har teir sum halda Guðslæru Bá´-lāām-s, sum lærdi Bálac at kasta ein snávingarstein fyri børn Ísraels, at eta ting, sláturofrað skurðgudum, og at fremja siðloysi.

15 Soleiðis hevurt tú eisini teir sum halda Guðslæru Nĭ-cō-lāĭ-ĭt´-anna, hvat ting eg hati.

16 Vend um; ella annars vil eg koma at tær skundisligani, og vil berjast ímóti teimum við svørði munns míns.

17 Hann sum hevur oyra, lat hann hoyra hvat Andin sigur við kirkjurnar; Til hansara, sum yvirvinnur, vil eg geva at eta av hinum fjalda măn´-nă, og vil geva honum ein hvítan stein, og í steininum eitt nýtt navn skrivað, sum eingin maður kennir uttan hann sum fær *hann*.

18 Og einglinum hjá kirkjuni í Thý-ă-tí´-rŭ skriva; Hesi ting sigur Sonur Guðs, sum hevur eygu síni lík einum loga av eldi, og hansara føtur *eru* líkir fínum kopari;

19 Eg veit verk tíni, og vælvild, og tænastu, og trúgv, og tolmóð tína, og verk tíni; og hini síðstu *at vera* fleiri enn hini fyrstu.

20 Hóast hetta, eg havi nøkur fá ting ímóti tær, av tí at tú loyvirt hasi kvinnuni Jĕz´-ĕ-bĕl, sum kallar seg sjálva eina prophetinnu, at frálæra og at tøla tænarar mínar til at fremja siðloysi, og at eta ting, sláturofrað skurðgudum.

21 Og eg gav henni bil til at venda um frá siðloysi sínum; og hon vendi ikki um.

22 Sí, eg vil kasta hana inn í eina song, og teir, sum fremja hordóm við henni, inn í mikla trongslu, uttan *so* teir vendi um frá gerðum sínum.

23 Og eg vil drepa hennara børn við deyða; og allar kirkjurnar skulu vita, at eg eri hann sum rannsakar nýruni og hjørtuni: og eg vil geva hvørjum *og* ēinum av tykkum samsvarandi við verkini hjá tykkum.

24 Men tykkum sigi eg, og restini í Thý-ă-tí´-rŭ, so mongum sum hava ikki hesa Guðslæru, og sum hava ikki kent dýpdir Satans, sum teir siga; Eg vil leggja uppá tykkum onga aðra byrði.

25 Men tað, sum tit hava *longu,* haldið fast *við* til eg komi.

26 Og hann sum yvirvinnur, og varðveitir verk míni *fram*at endanum, til hansara vil eg geva mátt yvir tjóðunum:

27 Og hann skal stjórna teimum við einum stavi av jarni; sum kerini hjá einum leirkerasmiði skulu tey verða brotin í flindur: enntá eins og eg fekk frá Faðir mínum.

28 Og eg vil geva honum morgunstjørnuna.

29 Hann sum hevur oyra, lat hann hoyra hvat Andin sigur við kirkjurnar.

KAPITUL 3

OG einglinum hjá kirkjuni í Săr´-dĭs skriva; Hesi ting sigur hann sum hevur hinar sjey Andar Guðs, og hinar sjey stjørnur; Eg veit verk tíni, at tú hevurt navn *av* at tú livirt, og ert deyður.

2 Ver árvakin, og styrk tey tingini sum eru eftir, sum eru um at doyggja: tí at eg havi ikki funnið verkini hjá tær fullkomin frammi fyri Guði.

3 Minst til, tessvegna, hvussu tú hevurt tikið ímóti og hoyrt, og halt fast, og vend um. Um, tessvegna, tú skalt ikki vaka, vil eg koma á teg sum ein tjóvur, og tú skalt ikki vita hvønn tíma eg vil koma uppá teg.

4 Tú hevurt nøkur fá nøvn enntá í Săr´-dĭs, sum hava ikki óreinkað síni klæðir; og teir skulu ganga við mær í hvítum: tí at teir eru verdigir.

5 Hann sum yvirvinnur, hin sami skal verða klæddur í hvítan klædnað; og eg vil ikki sletta út hansara navn út úr lívsins bók, men eg vil játta hansara navn frammi fyri Faðir mínum, og frammi fyri einglum hansara.

6 Hann sum hevur oyra, lat hann hoyra hvat Andin sigur við kirkjurnar.

7 Og til eingilin hjá kirkjuni í Philadelphiu skriva; Hesi ting sigur hann sum er heilagur, hann sum er sannur, hann sum hevur lykil Dávids, hann sum letur upp, og eingin maður letur aftur; og letur aftur, og eingin maður letur upp;

8 Eg veit verk tíni: sí, eg havi sett frammanfyri tær einar opnar dyr, og eingin maður kann lata tær aftur: tí at tú hevurt lítla styrki, og hevurt varðveitt orð mítt, og hevurt ikki avnoktað navn mítt.

9 Sí, eg vil elva teimum av sýnagogu Satans, sum siga *at* teir eru Jødar, og eru ikki, men lúgva; sí, eg vil elva teimum at koma og tilbiðja frammanfyri fótum tínum, og at vita at eg havi elskað teg.

10 Av tí at tú hevurt varðveitt orð tolmóðar mínar, eg eisini vil varðveita teg frá freistingarstundini, sum skal koma omanyvir allan heimin, til at royna teir sum dvøljast uppiá jørðini.

11 Sí, eg komi skundisligani: halt tað fast sum tú hevurt, at eingin maður taki krúnu tína.

12 Hann, sum yvirvinnur, vil eg gera *til* eina súlu í templi Guðs míns, og hann skal fara ei meira út: og eg vil skriva uppá hann navn Guðs míns, og navn staðar Guðs míns, *sum er* nýggja Jerusalem, sum kemur niður úr himni frá Guði mínum: og *eg vil skriva uppá hann* mítt nýggja navn.

13 Hann sum hevur oyra, lat hann hoyra hvat Andin sigur við kirkjurnar.

14 Og einglinum hjá kirkjuni hjá Lâ-ŏ-dĭ-cē´-arunum skriva; Hesi ting sigur Á´-mĕn, hitt trúfasta og sanna vitni, byrjanin til skapan Guðs;

15 Eg veit verk tíni, at tú ert hvørki kaldur ella heitur: eg vildi tú vart kaldur ella heitur.

16 So at av tí at tú ert flógvur, og hvørki kaldur ella heitur, vil eg spýggja teg út úr munni mínum.

17 Av tí at tú sigurt, Eg eri ríkur, og øktur við góðsi, og havi tørv á ongum; og veitst ikki, at tú ert vesælur, og ússaligur, og fátækur, og blindur, og nakin:

18 Tilráði eg tær at keypa av mær gull, roynt í eldinum, at tú mást verða ríkur; og hvítan klædnað, at tú mást verða klæddur, og skommin av tínum nakni birtist ei; og salva tíni eygu við eygnasalvu, at tú mást síggja.

19 So mangar sum eg elski, *teir* átali eg og agi: ver vandlátur tessvegna, og vend um.

20 Sí, eg standi við dyrnar, og banki *uppá:* um nakar maður hoyri rødd mína, og opni dyrnar, eg vil koma inn til hansara, og vil *eta* náttverða *saman* við honum, og hann við mær.

21 Til hansara, sum yvirvinnur, vil eg veita at sita hjá mær í hásæti

mínum, enntá eins og eg eisini yvirvann, og eri setstur niður hjá Faðir mínum í hásæti hansara.

22 Hann sum hevur oyra, lat hann hoyra hvat Andin sigur við kirkjurnar.

KAPITUL 4

EFTIR hetta hugdi eg, og sí, einar dyr *vórðu* latnar upp í himni: og hin fyrsta røddin, sum eg hoyrdi, *var* eins og var hon av einum lúðuri, talandi við meg; sum segði, Kom upp higar, og eg vil sýna tær ting sum mugu verða hereftir.

2 Og í stundini var eg í andanum: og sí, eitt hásæti var sett í himni, og *ēin* sat á hásætinum.

3 Og hann, sum sat, var á at líta líkur einum jaspis og einum sardis steini: og *har var* ein ælabogi rundan um hásætið, í ásýnd líkur einum smaragdi.

4 Og rundan um hásætið *vóru* fýra og tjúgu sætir: og uppiá sætunum sá eg fýra og tjúgu elstar sitandi, klæddir í hvítan klædnað; og teir høvdu á sínum høvdum krúnur av gulli.

5 Og út úr hásætinum útgingu snarljós˙ og torusláttir og røddir: og *har vóru* sjey lampur av eldi brennandi frammanfyri hásætinum, sum eru hinir sjey Andar Guðs.

6 Og frammanfyri hásætinum *var* eitt hav av glari, líkt krystalli: og í miðjum hásætinum, og rundan um hásætið, *vóru* fýra djór, full í eygum frammanfyri og aftanfyri.

7 Og tað fyrsta djórið *var* líkt eini leyvu, og hitt annað djórið líkt einum kálvi, og hitt triðja djórið hevði andlit sum ein maður, og hitt fjórða djórið *var* líkt eini flúgvandi ørn.

8 Og tey fýra djórini høvdu hvørt av teimum seks veingir rundan um *seg;* og *tey vóru* full í eygum innanvert: og tey hvíla ikki dag og nátt, sigandi, Heilagur, heilagur, heilagur, Harrin Guð Almáttugur, sum var, og er, og koma skal.

9 Og tá ið tey djórini geva dýrd og heiður og tøkkir til hansara sum sat á hásætinum, hvør livir um ævir og ævir,

10 Falla hinir fýra og tjúgu elstu niður frammi fyri honum sum sat á hásætinum, og tilbiðja hann sum livir um ævir og ævir, og kasta sínar krúnur framfyri hásætið, sigandi,

11 Tú ert verdur, O Harri, at fáa dýrd og heiður og mátt: tí at tú hevurt skapt øll ting, og fyri tína fragd tey eru og vórðu skapað.

KAPITUL 5

OG eg sá í høgru hondini á honum sum sat á hásætinum eina bók, skrivað innan og á baksíðuna, innsiglað við sjey innsiglum.

2 Og eg sá ein sterkan eingil, boðandi við harðari rødd, Hvør er verdur at opna bókina, og at loysa innsiglini hjá henni?

3 Og eingin maður í himni, ella á jørð, eiheldur undir jørðini, var førur fyri at opna bókina, eiheldur at hyggja hará.

4 Og eg græt mikið, av tí at eingin maður varð funnin verdigur at opna og at lesa bókina, eiheldur at hyggja hará.

5 Og ēin av teimum elstu sigur við meg, Grát ikki: sí, Leyvan av ættargrein Juda, Rótin av Dávidi, hevur sigrað til at opna bókina, og at loysa tey sjey innsiglini hjá henni.

6 Og eg skoðaði, og sí, í miðjum hásætinum og teimum fýra djórunum, og í miðjuni av teimum elstu, stóð eitt Lamb, sum hevði tað verið slátrað, havandi sjey horn og sjey eygu, sum eru hinir sjey Andar Guðs, sendir fram í alla jørðina.

7 Og hann kom og tók bókina

út úr høgru hondini á honum sum sat uppiá hásætinum.

8 Og tá ið hann hevði tikið bókina, fullu tey fýra djórini og *hinir* fýra *og* tjúgu elstu niður frammi fyri Lambinum, havandi hvør *og* ēin av teimum hørpur, og gyltar skálir fullar av roykilsum, sum eru bønirnar hjá heilagum.

9 Og teir sungu ein nýggjan song, sigandi, Tú ert verdur at taka bókina, og at opna innsiglini hjá henni: tí at tú varðst dripin, og hevurt endurkeypt okkum til Guðs viðˆ tínum blóði úr hvørji ætt, og tungu, og fólki, og tjóð;

10 Og hevurt gjørt okkum at Guði okkara *til* kongar og prestar: og vit skulu ríkja á jørðini.

11 Og eg skoðaði, og eg hoyrdi røddina á mongum einglum runt um hásætið og djórini og hinar elstu: og talið á teimum var tíggju túsund ferðir tíggju túsund, og túsundir av túsundum;

12 Sigandi við harðari rødd, Verdugt er Lambið, sum varð dripið, at móttaka mátt, og ríkdómar, og vísdóm, og styrki, og heiður, og dýrd, og signing.

13 Og hvønn skapning sum er í himni, og á jørðini, og undir jørðini, og slíkar sum eru í sjónum, og allar sum eru í teimum, hoyrdi eg sigandi, Signing, og heiður, og dýrd, og máttur, *veri* honum sum situr uppiá hásætinum, og Lambinum um ævir og ævir.

14 Og tey fýra djórini søgdu, Á-mēn. Og hinir fýra *og* tjúgu elstu fullu niður og tilbóðu hann sum livir um ævir og ævir.

KAPITUL 6

OG eg sá tá ið Lambið læt upp ēitt av innsiglunum, og eg hoyrdi, sum var tað ljóðið av toru, ēitt av teimum fýra djórunum sigandi, Kom og síggj.

2 Og eg sá, og sí ein hvítur hestur: og hann, sum sat á honum, hevði ein boga; og ein krúna varð givin honum: og hann fór út sigrandi, og til at sigra.

3 Og tá ið hann hevði latið upp hitt annað innsigli, hoyrdi eg hitt annað djórið siga, Kom og síggj.

4 Og tað fór út ein annar hestur, *sum var* reyður: og *máttur* varð givin til hansara, sum sat hará, at taka frið frá jørðini, og at teir skuldu drepa hvønn annan: og tað varð givið honum eitt stórt svørð.

5 Og tá ið hann hevði latið upp hitt triðja innsigli, hoyrdi eg hitt triðja djórið siga, Kom og síggj. Og eg skoðaði, og sí ein svartur hestur; og hann, sum sat á honum, hevði vágskál í síni hond.

6 Og eg hoyrdi eina rødd í miðjuni av teimum fýra djórunum siga, Eitt mál av hveiti fyri ein denar, og trý mál av byggi fyri ein denar; og *síggj til at* tú skaði ikki oljuna og vínið.

7 Og tá ið hann hevði latið upp hitt fjórða innsigli, hoyrdi eg røddina á tí fjórða djórinum siga, Kom og síggj.

8 Og eg leit, og sí ein bleikur hestur: og navn hansara, sum sat á honum, var Deyði, og Helviti fylgdi við honum. Og máttur varð givin teimum yvir fjórðinginum av jørðini, at drepa við svørði, og við hungri, og við deyða, og við villdjórum jarðarinnar.

9 Og tá ið hann hevði latið upp hitt fimta innsigli, sá eg undir altarinum sálirnar hjá teimum sum vóru vignir fyri orð Guðs, og fyri vitnisburðin sum teir hildu:

10 Og teir róptu við harðari rødd, sigandi, Hvussu leingi, O Harri, heilagi og sanni, dømirt tú ikki og hevnirt blóð várt á teir sum dvøljast á jørðini?

11 Og hvítar skikkjur vórðu givnar hvørjum *og* ēinum av teimum; og tað varð sagt teimum, at teir skuldu hvíla enn í eina stutta tíð,

inntil teirra samtænarar eisini og teirra brøður, sum skuldu verða dripnir eins og teir *vórðu,* skuldi verða uppfylt.

12 Og eg skoðaði tá ið hann hevði latið upp hitt sætta innsigli, og sí, har varð ein mikil jarðskjálvti; og sólin varð svørt sum sekkjaklæði av hári, og mánin varð sum blóð;

13 Og stjørnur himins fullu til jarðarinnar, enntá sum eitt fikutræ kastar sínar óstadnu fikur, tá ið tað verður rist av einum mektigum vindi.

14 Og himinin fór burtur sum ein *bókar*rulla, tá ið hon verður rullað saman; og hvørt fjall og *hvør* oyggj vórðu flutt úr plássum sínum.

15 Og kongar jarðarinnar, og hinir miklu menn, og hinir ríku menn, og hinir fremstu høvuðsmenn, og hinir mektigu menn, og hvør trælsveinur, og hvør frímaður, fjaldu seg í hellum og í klettum fjallanna;

16 Og søgdu til fjallanna og klettanna, Fallið á okkum, og fjalið okkum frá andlitinum hjá honum sum situr á hásætinum, og frá vreiði Lambsins:

17 Tí at hin mikli dagur vreiðis hansara er komin; og hvør skal verða førur fyri at standast?

KAPITUL 7

OG eftir hesi tingini sá eg fýra einglar, standandi á hinum fýra hornum jarðarinnar, haldandi hinum fýra vindum jarðarinnar, at vindurin skuldi ikki blása á jørðina, ella á sjógvin, ella á nakað træ.

2 Og eg sá ein annan eingil stígandi upp frá eystri, havandi innsigli hins livandi Guðs: og hann rópti við harðari rødd til hinna fýra eingla, til hvørja tað varð givið at granda jørðini og havinum,

3 Sigandi, Grandið ikki jørðini, eiheldur havinum, ella trøunum, til vit hava innsiglað tænarar Guðs várs í ennum teirra.

4 Og eg hoyrdi talið á teimum sum vórðu innsiglaðir: *og tað vórðu* innsiglaðir eitt hundrað *og* fýrati *og* fýra túsund av øllum ættargreinum Ísraels barna.

5 Av ættargrein Juda *vórðu* innsiglaðir tólv túsund. Av ættargrein Reûbens *vórðu* innsiglaðir tólv túsund. Av ættargrein Gáds *vórðu* innsiglaðir tólv túsund.

6 Av ættargrein Ā´-sĕr-s *vórðu* innsiglaðir tólv túsund. Av ættargrein Nĕp´-thă-lĭm-s *vórðu* innsiglaðir tólv túsund. Av ættargrein Mă-năs´-sēs *vórðu* innsiglaðir tólv túsund.

7 Av ættargrein Símeons *vórðu* innsiglaðir tólv túsund. Av ættargrein Levīs *vórðu* innsiglaðir tólv túsund. Av ættargrein Ĭs´-să-chär-s *vórðu* innsiglaðir tólv túsund.

8 Av ættargrein Zā´-bû-lŏn-s *vórðu* innsiglaðir tólv túsund. Av ættargrein Jósephs *vórðu* innsiglaðir tólv túsund. Av ættargrein Benjamins *vórðu* innsiglaðir tólv túsund.

9 Eftir hetta skoðaði eg, og sí, ein mikil fjøld, sum eingin maður kundi upptelja, av øllum tjóðum, og ættum, og fólkum, og tungum, stóð frammanfyri hásætinum, og frammi fyri Lambinum, klædd við hvítum skikkjum, og pálmum í hondum sínum;

10 Og róptu við harðari rødd, sigandi, Frelsa til Guðs várs sum situr uppiá hásætinum, og Lambinum.

11 Og allir einglarnir stóðu rundan um hásætið, og *um* hinar elstu og tey fýra djórini, og fullu frammanfyri hásætið á síni andlit, og tilbóðu Guð,

12 Sigandi, Á-měn: Signing, og dýrd, og vísdómur, og takkarveitan, og heiður, og máttur, og kraft, *veri* Guði várum um ævir og ævir. Á-měn.

13 Og ēin av teimum elstu tók til orða, sigandi við meg, Hvat eru hesir sum eru klæddir í hvítar skikkjur? og hvaðan komu teir?
14 Og eg segði við hann, Harri, tú veitst. Og hann segði til mín, Hesir eru teir sum komu út úr miklari trongslu, og hava tvigið sínar skikkjur, og gjørt tær hvítar í blóði Lambsins.
15 Tí eru teir frammanfyri hásæti Guðs, og tæna honum dag og nátt í templi hansara: og hann, sum situr á hásætinum, skal dvøljast teirra millum.
16 Teir skulu hungra ei meira, eiheldur tyrsta meira; eiheldur skal sólin lýsa á teir, ella nakar hiti.
17 Tí at Lambið, sum er í miðjum hásætinum, skal føða teir, og skal leiða teir at livandi keldum av vøtnum: og Guð skal turka burtur øll tár frá eygum teirra.

KAPITUL 8

OG tá ið hann hevði latið upp hitt sjeynda innsigli, var tað tøgn í himni umleið skeiðið á ein hálvan tíma.
2 Og eg sá hinar sjey einglar sum stóðu frammi fyri Guði; og til teirra vórðu givnir sjey lúðrar.
3 Og ein annar eingil kom og stóð við altarið, havandi eitt gylt roykilsisker; og tað varð givið honum mikið roykilsi, at hann skuldi ofra *tað* við bønunum av øllum heilagum uppiá hinum gylta altari sum var frammanfyri hásætinum.
4 Og roykurin av roykilsinum, *sum kom* við bønunum av teimum heilagu, steig upp framfyri Guð út úr hond eingilsins.
5 Og eingilin tók roykilsiskerið, og fylti tað við eldi av altarinum, og kastaði *tað* útá jørðina: og tað vórðu røddir, og torusláttir, og snarljós˘, og ein jarðskjálvti.
6 Og teir sjey einglarnir, sum høvdu teir sjey lúðrarnar, búðu seg til at ljóða.
7 Hin fyrsti eingilin ljóðaði, og har fylgdi heglingur og eldur, blandað við blóði, og tey vórðu kastað omaná jørðina: og triðjingurin av trøum varð brendur upp, og alt grønt gras varð brent upp.
8 Og hin annar eingilin ljóðaði, og sum var tað eitt mikið fjall, brennandi við eldi, varð kastað inn í sjógvin: og triðjingurin av sjónum gjørdist blóð;
9 Og triðjingurin av skapningunum sum vóru í sjónum, og høvdu lív, doyðu; og triðjingurin av skipunum vórðu oyðiløgd.
10 Og hin triðji eingilin ljóðaði, og tað fell ein mikil stjørna frá himni, brennandi sum var hon ein lampa, og hon fell uppá triðjingin av áunum, og uppá keldurnar av vøtnum;
11 Og navnið á stjørnuni kallast Malurt: og triðjingurin av vøtnunum gjørdust malurt; og mangir menn doyðu av vøtnunum, av tí at tey vórðu gjørd beisk.
12 Og hin fjórði eingilin ljóðaði, og triðjingurin av sólini varð sligin, og triðjingurin av mánanum, og triðjingurin av stjørnunum; soleiðis *at* triðjingurin av teimum varð myrkjaður, og dagurin skein ikki í triðjinginum av honum, og náttin somuleiðis.
13 Og eg skoðaði, og hoyrdi ein eingil flúgvandi ígjøgnum miðjan himin, sigandi við harðari rødd, Vei, vei, vei, íbúgvum jarðarinnar, uppá grund av hinum røddunum av lúðrunum hjá teimum trimum einglunum, sum eiga enn at ljóða!

KAPITUL 9

OG hin fimti eingilin ljóðaði, og eg sá eina stjørnu falla frá himni til jarðarinnar: og til hansara varð givin lykil hinnar botnleysu avgrundar.
2 Og hann læt upp hina botnleysu avgrund; og tað steig upp ein roykur burtur úr avgrundini,

sum roykurin úr einum miklum bræðsluovni; og sólin og luftin vórðu myrkjað orsakað av roykinum úr avgrundini.

3 Og tað komu burtur úr roykinum grashoppur uppá jørðina: og teim varð givin máttur, eins og sporðdrekar jarðarinnar hava mátt.

4 Og tað varð boðið teimum, at tær skuldu ikki granda grasi jarðarinnar, eiheldur nøkrum grønum tingi, eiheldur nøkrum træi; men einans teimum monnunum sum hava ikki innsigli Guðs í ennum sínum.

5 Og til teirra varð tað givið, at tær skuldu ikki drepa teir, men at teir skuldu verða pínslaðir fimm mánaðir: og teirra pínslan *var* sum pínslingin av einum sporðdreka, tá ið hann slær ein mann.

6 Og í teimum døgum skulu menn søkja deyða, og skulu ikki finna hann; og skulu tráa at doyggja, og deyði skal flýggja frá teimum.

7 Og skapini á grashoppunum *vóru* lík hestum, búnir til bardaga; og á teirra høvdum *vóru* sum vóru tað krúnur líkar gulli, og teirra andlit *vóru* sum andlitini á monnum.

8 Og tær høvdu hár sum hárið á kvinnum, og teirra tenn vóru sum *tenninar* á leyvum.

9 Og tær høvdu bróstbrynjur, sum vóru tað bróstbrynjur av jarni; og ljóðið av teirra veingjum *var* sum ljóðið av vagnum hjá mongum hestum, rennandi til bardaga.

10 Og tær høvdu halar líkar sporðdrekum, og tað vóru stungur í teirra halum: og teirra máttur *var* at granda monnum fimm mánaðir.

11 Og tær høvdu ein kong yvir sær, *sum er* eingil hinnar botnleysu avgrundar, hvørs navn á hini Hebrãisku tungu *er* Ă-băd´-dŏn, men á hini Griksku tungu hevur navn *sítt* Ă-pŏl´-lў-ŏn.

12 Eitt vei er umliðið; *og* sí, tað koma tvey vei afturat hereftir.

13 Og hin sætti eingilin ljóðaði, og eg hoyrdi eina rødd frá teimum fýra hornunum á hinum gylta altari sum er frammanfyri Guði,

14 Sigandi til hin sætta eingilin, sum hevði lúðurin, Loys teir fýra einglarnar, sum eru bundnir í hini miklu ánni Ĕv-phrā´-tēs.

15 Og teir fýra einglarnir vórðu loystir, sum vóru tilreiðar til ein tíma, og ein dag, og ein mánað, og eitt ár, til *tess* at bana triðjinginum av monnum.

16 Og talið á herliðinum av reiðmonnunum *var* tvey hundrað túsund túsund: og eg hoyrdi talið á teimum.

17 Og soleiðis sá eg hestarnar í sjónini, og teir sum sótu á teimum, havandi bróstbrynjur av eldi, og av hýasint, og svávuli: og høvdini á hestunum *vóru* sum høvdini á leyvum; og úr teirra munnum útgekk eldur og roykur og svávul.

18 Viðˆ hesum trimum varð triðjingurin av monnum dripin, viðˆ eldinum, og viðˆ roykinum, og viðˆ svávulinum, sum útgekk út úr munnum teirra.

19 Tí at teirra máttur er í teirra munni, og í teirra halum: tí at teirra halar *vóru* líkir høggormum, og høvdu høvdˇ, og við teimum meina teir.

20 Og restin av monnunum, sum vórðu ikki dripnir viðˆ hesum plágunum, tó vendu ikki um frá verkunum av teirra hondum, at teir skuldu ikki tilbiðja djevlar, og skurðgudar av gulli, og silvuri, og kopari, og steini, og av træi: sum hvørki kunnu síggja, ella hoyra, ella ganga:

21 Eiheldur vendu teir um frá morðum sínum, ella frá gandingum sínum, ella frá siðloysi sínum, ella frá tjóvaríum sínum.

KAPITUL 10

OG eg sá ein annan mektigan eingil koma niður frá himni, klæddan við einum skýggi: og ein ælabogi *var* uppiá høvdi hansara, og hans andlit *var* sum var tað sólin, og hansara føtur sum stólpar av eldi:

2 Og hann hevði í síni hond eina lítla bók opna: og hann setti sín høgra fót uppá sjógvin, og *sín* vinstra *fót* á jørðina,

3 Og rópti við harðari rødd, sum *tá ið* ein leyva ýlir: og tá ið hann hevði rópað, mæltu røddum sínum sjey torur.

4 Og tá ið tær sjey torurnar høvdu mælt røddum sínum, var eg um at skriva: og eg hoyrdi eina rødd frá himni, sigandi við meg, Sigla inn hasi tingini sum hinar sjey torurnar mæltu, og skriva tey ikki.

5 Og eingilin, sum eg sá standa uppiá sjónum og uppiá jørðini, lyfti upp sína hond til himins,

6 Og svór við hann sum livir um ævir og ævir, sum skapaði himin, og teir lutir sum harí eru, og jørðina, og teir lutir sum harí eru, og sjógvin, og teir lutir sum eru harí, at tað skuldi vera tíð ei longur:

7 Men í døgunum av røddini av hinum sjeynda einglinum, tá ið hann skal byrja at ljóða, skuldi verða fullførdur loyndardómur Guðs, eins og hann hevur kunngjørt fyri tænarum sínum prophetunum.

8 Og røddin, sum eg hoyrdi frá himni, talaði við meg aftur, og segði, Far *og* tak ta lítlu bókina, sum er opin í hondini hjá einglinum, sum stendur uppiá sjónum og uppiá jørðini.

9 Og eg fór at einglinum, og segði við hann, Gev mær ta lítlu bókina. Og hann segði við meg, Tak *hana,* og et hana upp; og hon skal gera búk tín beiskan, men hon skal vera í tínum munni søt sum hunangur.

10 Og eg tók ta lítlu bókina út úr hondini á einglinum, og át hana upp; og hon var í mínum munni søt sum hunangur: og so skjótt sum eg hevði etið hana, varð búkur mín beiskur.

11 Og hann segði við meg, Tú mást prophetera aftur frammi fyri mongum fólkum, og tjóðum, og tungum, og kongum.

KAPITUL 11

OG tað varð givið mær eitt rør, líkt einum stavi: og eingilin stóð, sigandi, Reis *teg,* og máta tempul Guðs, og altarið, og teir sum tilbiðja harí.

2 Men forgarðin, sum er uttanfyri templið, útilat, og máta hann ikki; tí at hann er givin Heidningunum: og hin heilaga staðin skulu teir traðka undir fót fjøruti *og* tveir mánaðir.

3 Og eg vil geva mínum tveim vitnum *mátt,* og teir skulu prophetera eitt túsund tvey hundrað *og* trísinstjúgu dagar, klæddir í sekkjaklæði.

4 Hesir eru tey tvey olivintrøini, og teir tveir ljósastakarnir, standandi frammi fyri Guði jarðarinnar.

5 Og um nakar maður vilji granda teimum, útgongur út úr munni teirra eldur, og upptærir teirra fíggindar: og um nakar maður vilji granda teimum, hann má á henda hátt verða dripin.

6 Hesir hava mátt til at loka himin, at tað regni ikki í døgunum av teirra prophetiī: og hava mátt yvir vøtnum at umbroyta tey til blóð, og at sláa jørðina við øllum plágum, so ofta sum teir vilja.

7 Og tá ið teir skulu hava fullført sín vitnisburð, skal djórið, sum stígur upp úr tí botnleysu avgrundini, føra kríggj ímóti

teimum, og skal vinna yvir teimum, og drepa teir.

8 Og teirra deyðu likam *skulu liggja* í gøtu hins mikla staðar, sum andliga kallast Sodoma og Egyptaland, har eisini Harri okkara varð krossfestur.

9 Og teir av fólkunum og ættunum og tungunum og tjóðunum skulu síggja teirra deyðu likam tríggjar dagar og hálvan, og skulu ikki loyva teirra deyðu likam at verða sett í gravir.

10 Og teir, sum dvøljast uppiá jørðini, skulu fegnast yvir teimum, og halda sær at gamni, og skulu senda gávur hvør til annars; av tí at hesir tveir prophetarnir pínslaðu teir sum dvaldust á jørðini.

11 Og eftir tríggjar dagar og hálvan innfór lívs-Andin frá Guði inn í teir, og teir stóðu upp á føtur sínar; og mikil ótti fell uppá teir sum sóu teir.

12 Og teir hoyrdu eina mikla rødd frá himni, sigandi við teir, Komið upp higar. Og teir stigu upp til himins í einum skýggi; og teirra fíggindar skoðaðu teir.

13 Og hin sama tíma var tað ein mikil jarðskjálvti, og tíggjundiparturin av staðinum fell, og í jarðskjálvtanum vórðu vignir av monnum sjey túsund: og leivdin varð ræðslusligin, og gav dýrd til Guðs himins.

14 Hitt annað vei er umliðið; *og* sí, tað triðja veið kemur brátt.

15 Og hin sjeyndi eingilin ljóðaði; og tað vóru miklar røddir í himni, sigandi, Kongadømini av hesum heimi eru vorðin *kongadømini* hjá Harra várum, og hjá Christi hansara; og hann skal ríkja um ævir og ævir.

16 Og teir fýra og tjúgu elstu, sum sótu frammi fyri Guði á sætum sínum, fullu uppá andlit síni, og tilbóðu Guð,

17 Sigandi, Vit veita tær tøkkir, O Harri Guð Almáttugur, sum ert, og vart, og koma skalt; av tí at tú hevurt tikið til tín tín mikla mátt, og hevurt rátt.

18 Og tjóðirnar vórðu firtnar, og tín vreiði er komin, og tíðin hjá teimum deyðu, at teir skuldu verða dømdir, og at tú skuldirt geva endurgjald innat tænarum tínum prophetunum, og til hinna heilagu, og teimum ið óttast navn títt, smáum og miklum; og skuldirt oyða teir sum oyða jørðina.

19 Og Guðs tempul varð latið upp í himni, og tað varð sædd í hansara templi ørk testamentis hansara: og tað vórðu snarljós˘, og røddir, og torusláttir, og ein jarðskjálvti, og mikil heglingur.

KAPITUL 12

OG tað birtist eitt mikið undur í himni; ein kvinna, klædd við sólini, og mánin undir fótum hennara, og uppiá hennara høvdi ein krúna av tólv stjørnum:

2 Og hon, verandi við barn, rópti, verkjandi í føðing, og píndist at verða loyst.

3 Og tað birtist eitt annað undur í himni; og sí ein mikil reyður dreki, havandi sjey høvd og tíggju horn, og sjey krúnur uppiá høvdum hansara.

4 Og hali hansara dró triðjingin av stjørnum himins, og kastaði tær til jarðarinnar: og drekin stóð frammanfyri kvinnuni, sum var tilreiðar at verða loyst, fyri at gloypa hennara barni, so skjótt sum tað var føtt.

5 Og hon bar fram eitt sveinsbarn, sum varð at stjórna øllum tjóðum við einum stavi av jarni: og hennara barn varð rykt upp at Guði, og *til* trónu hansara.

6 Og kvinnan flýddi inn í oyðuna, har hon hevur eitt stað gjørt til reiðar av Guði, at teir skuldu føða hana har eitt túsund tvey hundrað *og* trísinstjúgu dagar.

7 Og tað varð kríggj í himni:

Michael og einglar hansara bardust ímóti drekanum; og drekin bardist og einglar hansara,

8 Og vórðu ikki við yvirlutan; eiheldur varð teirra pláss funnið longur í himni.

9 Og hin mikli drekin varð kastaður út, hasin gamli høggormurin, kallaður Djevulin, og Satan, sum villleiðir allan heimin: hann varð kastaður út á jørðina, og hans einglar vórðu kastaðir út við honum.

10 Og eg hoyrdi eina harða rødd, sigandi í himni, Nú er komin frelsa, og styrki, og kongadømi Guðs várs, og máttur Christs hansara: tí at ákærari brøðra vára er kastaður niður, sum ákærdi teir frammi fyri Guði várum dag og nátt.

11 Og teir vunnu á honum við blóði Lambsins, og við orði vitnisburðar síns; og teir elskaðu ikki lív síni at deyðanum.

12 Tessvegna fegnist, *tit* himnar, og tit sum búgva í teimum. Vei íbúgvum jarðarinnar og havsins! tí at djevulin er komin niður til tykkara, havandi mikla vreiði, av tí at hann veit, at hann hevur bert eina stutta tíð.

13 Og tá ið drekin sá, at hann var kastaður til jarðarinnar, søkti hann at kvinnuni sum bar fram sveins*barnið*.

14 Og til kvinnuna vórðu givnir tveir veingir av eini miklari ørn, at hon mátti flúgva inn í oyðuna, inn í pláss sítt, har hon verður nørd í eina tíð, og tíðir, og hálva tíð, frá andliti høggormsins.

15 Og høggormurin kastaði út úr munni sínum vatn sum eina flóð eftir kvinnuni, at hann mátti volda henni at verða borin burtur av flóðini.

16 Og jørðin hjálpti kvinnuni, og jørðin læt upp munn sín, og svølgdi upp flóðina sum drekin kastaði út úr munni sínum.

17 Og drekin varð vreiður við kvinnuna, og fór at føra kríggj við leivdina av hennara sáði, sum varðveita boðini hjá Guði, og hava vitnisburð Jesu Christs.

KAPITUL 13

OG eg stóð uppiá sandi havsins, og sá eitt djór rísa upp út úr sjónum, havandi sjey høvd og tíggju horn, og uppiá hansara hornum tíggju krúnur, og uppiá hansara høvdum Guðsspottanarnavnið.

2 Og djórið, sum eg sá, var líkt einum leopardi, og hansara føtur vóru sum *føturnir* á eini bjørn, og hansara munnur sum munnurin á eini leyvu: og drekin gav honum mátt sín, og sæti sítt, og miklan myndugleika.

3 Og eg sá ēitt av hansara høvdum, sum var tað sært til deyða; og hansara deyðiliga sár varð grøtt: og allur heimurin undraðist eftir djórinum.

4 Og teir tilbóðu drekan, sum gav djórinum mátt: og teir tilbóðu djórið, sigandi, Hvør *er* líkur djórinum? hvør er førur fyri at føra kríggj við hann?

5 Og tað varð givin honum ein munnur, talandi miklar lutir og Guðsspottanir; og máttur varð givin honum at halda áfram fjøruti *og* tveir mánaðir.

6 Og hann læt upp munn sín í Guðsspottan ímóti Guði, at Guðsspotta navn hansara, og tabernakkul hansara, og teir sum búgva í himni.

7 Og tað varð givið honum at føra kríggj við hinar heilagu, og at vinna á teimum: og máttur varð givin honum yvir øllum ættum, og tungum, og tjóðum.

8 Og allir, sum dvøljast uppiá jørðini, skulu tilbiðja hann, hvørs nøvn eru ikki skrivað í lívsins bók hjá Lambinum – slátrað frá grundlegging veraldarinnar.

9 Um nakar maður havi oyra, lat hann hoyra.

10 Hann, sum leiðir inn í fangaskap, skal fara inn í fangaskap: hann, sum drepur við svørðinum, má verða dripin við svørðinum. Her er tolmóðin og trúgvin hjá teimum heilagu.

11 Og eg skoðaði eitt annað djór, komandi upp út úr jørðini; og hann hevði tvey horn líka *sum* eitt lamb, og hann talaði sum ein dreki.

12 Og hann útinnir allan mátt-in hjá tí fyrsta djórinum frammi fyri honum, og elvir jørðini og teimum sum dvøljast hará at tilbiðja tað fyrsta djórið, hvørs deyðiliga sár varð grøtt.

13 Og hann ger mikil undur, so at hann fær eld *at* koma niður frá himni á jørðina í eygsjón manna,

14 Og villleiðir teir sum dvøljast á jørðini, *við brúkinum av* hasum kraftaverkunum sum hann hevði mátt til at gera í eygsjón djórsins; sigandi til teirra sum dvøljast á jørðini, at teir skuldu gera eina mynd til djórið, sum hevði sárið av einum svørði, og livdi.

15 Og hann hevði mátt til at geva mynd djórsins lív, at mynd djórsins skuldi bæði tala, og elva, at so mangir sum vildu ikki tilbiðja mynd djórsins, skuldu verða dripnir.

16 Og hann veldur øllum, bæði smáum og miklum, ríkum og fátøkum, fríum og trælum, at móttaka eitt merki í høgru hond sína, ella í ennir síni:

17 Og at eingin maður mátti keypa ella selja, uttan hann sum hevði merkið, ella navn djórsins, ella tal navns hansara.

18 Her er vísdómur. Lat hann, sum hevur skil, telja tal djórsins: tí at tað er talið hjá einum manni; og hansara tal *er* Seks hundrað *og* trísinstjúgu *og* seks.

KAPITUL 14

OG eg leit, og sí, eitt Lamb stóð á fjallinum Sï´-ðn, og við honum eitt hundrað *og* fýrati fýra túsund, havandi navn Faðirs hansara skrivað í ennum sínum.

2 Og eg hoyrdi eina rødd frá himni, sum røddin av mongum vøtnum, og sum røddin av eini miklari toru: og eg hoyrdi røddina av harparum, harpandi við hørpum sínum:

3 Og teir sungu sum var tað ein nýggjan sang frammanfyri hásætinum, og frammi fyri teimum fýra djórunum, og teimum elstu: og eingin maður kundi læra handan sangin, uttan hinir hundrað *og* fýrati *og* fýra túsund, sum vóru endurloystir frá jørðini.

4 Hesir eru teir sum vórðu ikki dálkaðir við kvinnum; tí at teir eru jomfrýr. Hesir eru teir sum fylgja Lambinum hvagarsumhelst hann fer. Hesir vórðu endurloystir manna millum ífrá, *verandi* frumgróðurin at Guði og til Lambið.

5 Og í teirra munni fanst einkið fals: tí at teir eru uttan feil frammanfyri hásæti Guðs.

6 Og eg sá ein annan eingil flúgva í miðjum himni, havandi hin ævigtvarandi gleðiboðskap at prædika teimum sum búgva á jørðini, og fyri hvørji tjóð, og ætt, og tungu, og fólki,

7 Sigandi við harðari rødd, Óttist Guð, og gevið dýrd til hansara; tí at tímin av hansara dómi er komin: og tilbiðjið hann sum gjørdi himin, og jørð, og sjógvin, og keldurnar av vøtnum.

8 Og tað fylgdi ein annar eingil, sigandi, Bábylon er fallin, er fallin, hasin mikli staðurin, av tí at hon fekk allar tjóðir *at* drekka av vínինum av vreiðini av sínum siðloysi.

9 Og hin triðji eingilin fylgdi

teimum, sigandi við harðari rødd, Um nakar maður tilbiðji djórið og mynd hans, og móttaki merki *hans* í enni sítt, ella í hond sína,

10 Hin sami skal drekka av vínum av vreiði Guðs, sum verður helt út uttan blanding inn í bikar harmavreiðis hans; og hann skal verða pínslaður við eldi og svávuli í nærveru hinna heilagu eingla, og í nærveru Lambsins:

11 Og roykurin av teirra pínslu stígur upp um ævir og ævir: og teir hava onga hvílu dag ella nátt, sum tilbiðja djórið og mynd hansara, og hvørsumhelst *ið* móttekur merki navns hansara.

12 Her er tolmóðin hjá teimum heilagu: her *eru* teir sum halda boðini hjá Guði, og Jesu trúgv.

13 Og eg hoyrdi eina rødd frá himni sigandi við meg; Skriva, Vælsignaðir *eru* hinir deyðu sum doyggja í Harranum hiðanífrá: Ja, sigur Andin, at teir mega hvíla frá strevum sínum; og teirra verk fylgja teimum.

14 Og eg hugdi, og sí eitt hvítt skýggj, og uppiá skýnum sat *ēin,* líkur Menniskjusyninum, havandi á sínum høvdi eina gylta krúnu, og í síni hond ein hvassan akurknív.

15 Og ein annar eingil kom út úr templinum, rópandi við harðari rødd til hansara sum sat á skýnum, Stoyt inn tín akurknív, og heysta: tí at tíðin er komin hjá tær at heysta; tí at jarðarinnar heyst er staðið.

16 Og hann, sum sat á skýnum, stoytti inn sín akurknív á jørðina; og jørðin varð heystað.

17 Og ein annar eingil kom út úr templinum sum er í himni, hann eisini havandi ein hvassan akurknív.

18 Og ein annar eingil kom út frá altarinum, sum hevði mátt yvir eldi; og rópaði við hørðum rópi til hansara sum hevði hin hvassa akurknívin, sigandi, Stoyt inn tín hvassa akurknív, og henta tyssini av víntræi jarðarinnar; tí at hennara vínber eru fult staðin.

19 Og eingilin stoytti inn sín akurknív inn í jørðina, og hentaði víntræ jarðarinnar, og kastaði *tað* inn í hina miklu vínpersu vreiðis Guðs.

20 Og vínpersan varð troðin uttanfyri staðin, og blóð kom út úr vínpersuni, enntá at boygslunum hjá hestunum, yvir skeiðið á eitt túsund *og* seks hundrað stádiur.

KAPITUL 15

OG eg sá eitt annað tekin í himni, mikið og undrunarvert, sjey einglar, havandi hinar sjey síðstu plágur; tí at í teimum er fylt upp Guðs vreiði.

2 Og eg sá sum var tað eitt hav av glari blandað við eldi: og teir sum høvdu fingið sigurin yvir djórinum, og yvir mynd hansara, og yvir merki hansara, *og* yvir tali navns hansara, standa á havinum av glari, havandi hørpur Guðs.

3 Og teir syngja song Mósesar, tænara Guðs, og song Lambsins, sigandi, Mikil og undrunarverd *eru* verk tíni, Harri Guð Almáttugur; rættvísir og sannir *eru* vegir tínir, tú Kongur hjá heilagum.

4 Hvør skal ikki óttast teg, O Harri, og dýrðmeta navn títt? tí at *tú* eina *ert* heilagur: tí at allar tjóðir skulu koma og tilbiðja frammi fyri tær; tí at dómar tínir eru gjørdir eyðsýndir.

5 Og eftir tað hugdi eg, og sí, templið av tabernakli vitnisburðarins í himni varð latið upp:

6 Og teir sjey einglarnir komu út úr templinum, havandi tær sjey plágurnar, klæddir í skírt og hvítt lín, og havandi bróst síni gyrd við gyltum gyrðlum.

7 Og ēitt av teimum fýra djórunum gav teimum sjey einglunum sjey gyltar skálir, fullar av vreiði Guðs, sum livir um ævir og ævir.

8 Og templið varð fylt við royki frá dýrd Guðs, og frá kraft hansara; og eingin maður var førur fyri at fara inn í templið, til tær sjey plágurnar hjá teimum sjey einglunum vóru uppfyltar.

KAPITUL 16

OG eg hoyrdi eina mikla rødd út úr templinum, sigandi til hinna sjey eingla, Farið leiðir tykkara, og hellið út skálirnar av vreiði Guðs uppá jørðina.

2 Og hin fyrsti fór, og helti út sína skál uppá jørðina; og tað fell ein herviligur og svárligur svullur uppá teir menninar sum høvdu merki djórsins, og *uppá* teir sum tilbóðu mynd hansara.

3 Og hin annar eingilin helti út sína skál uppá sjógvin; og hann gjørdist sum blóðið av deyðum *manni:* og hvør livandi sál doyði í sjónum.

4 Og hin triðji eingilin helti út sína skál uppá áirnar og keldurnar av vøtnum; og tey gjørdust blóð.

5 Og eg hoyrdi eingil vatnanna siga, Tú ert rættvísur, O Harri, sum ert, og vart, og vera skalt, av tí at tú hevurt dømt soleiðis.

6 Tí at teir hava úthelt blóðið av heilagum og prophetum, og tú hevurt givið teim blóð at drekka; tí at teir eru verdigir.

7 Og eg hoyrdi ein annan út úr altarinum siga, Enntá so, Harri Guð Almáttugur, sannir og rættvísir *eru* dómar tínir.

8 Og hin fjórði eingilin helti út sína skál uppá sólina; og máttur varð givin honum at svíða menn við eldi.

9 Og menn vórðu svidnir við miklum hita, og Guðsspottaðu navn Guðs, sum hevði mátt yvir hesum plágunum: og teir vendu ikki um til at geva honum dýrd.

10 Og hin fimti eingilin helti út sína skál uppá sæti djórsins; og hansara kongadømi varð fult av myrkri; og teir gnagaðu sínar tungur fyri pínu,

11 Og Guðsspottaðu Guð himins uppá grund av pínum sínum og sárum sínum, og vendu ikki um frá gerðum sínum.

12 Og hin sætti eingilin helti út sína skál uppá hina miklu ánna Ev-phrā´-tēs; og vatnið hjá henni varð turkað upp, at vegurin hjá kongunum úr eystri mátti verða fyribúgvin.

13 Og eg sá tríggjar óreinar andar, líkar froskum, *koma* út úr munninum á drekanum, og út úr munninum á djórinum, og út úr munninum á tí falska prophetinum.

14 Tí at teir eru djevla-andar, virkandi kraftaverkˇ, *sum* fara út at kongum jarðarinnar og hinnar heilu veraldar, at savna teir til bardaga hins mikla dags Guðs Almáttugs.

15 Sí, eg komi sum ein tjóvur. Signaður *er* hann sum vakir, og varðveitir klæðir síni, at ikki hann gangi nakin, og teir síggi skomm hansara.

16 Og hann savnaði teir saman at einum staði, kallað á hini Hebrāisku tungu Âr-mă-gêd´-dōn.

17 Og hin sjeyndi eingilin helti út sítt bikar inn í luftina; og tað kom ein mikil rødd út úr templi himins, frá hásætinum, sigandi, Tað er gjørt.

18 Og tað vórðu røddir, og torur, og snarljósˇ; og tað varð ein mikil jarðskjálvti, slíkur sum var ikki síðan menn vóru uppiá jørðini, so mektigur ein jarðskjálvti, *og* so mikil.

19 Og hin mikli staðurin varð deildur í tríggjar lutir, og staðir tjóðanna fullu: og mikla Bábylon kom í endurminning frammi fyri Guði, at geva henni bikarið av víninum av grimmleikanum av síni vreiði.

20 Og hvør oyggj flýggjaði burtur, og fjøllini vórðu ikki funnin.

21 Og tað fell uppá menn ein mikil heglingur út úr himni, *hvør steinur* umleið vektina á eini talent: og menn Guðsspottaðu Guð uppá grund av pláguni av heglinginum; tí at plágan av honum var ovurhonds mikil.

KAPITUL 17

OG har kom ēin av teimum sjey einglunum sum høvdu tær sjey skálirnar, og talaði við meg, sigandi við meg, Kom higar; eg vil sýna tær dómin av hini miklu skøkju sum situr uppiá mongum vøtnum:

2 Við hvørji kongar jarðarinnar hava framt siðloysi, og íbúgvar jarðarinnar eru vorðnir gjørdir druknir við vínինum av hennara siðloysi.

3 So hann bar meg burtur í andanum inn í oyðuna: og eg sá eina kvinnu sita uppiá einum skarlakslittum djóri, fult í Guðsspottanar-nøvnum, havandi sjey høvd og tíggju horn.

4 Og kvinnan var skrýdd í purpur og skarlaks lit, og dekkað við gulli og dýrabærum steinum og perlum, havandi eitt gylt bikar í síni hond fult av andstygdum og óreinsku av sínum siðloysi:

5 Og uppiá enni hennara *var* eitt navn skrivað, LOYNDARDÓMUR, BÁBYLON MIKLA, MÓÐIRIN AT SKØKJUM OG ANDSTYGDUM JARÐARINNAR.

6 Og eg sá kvinnuna drukna við blóði teirra heilagu, og við blóði Jesu martýra: og tá ið eg sá hana, undraðist eg við miklari undran.

7 Og eingilin segði við meg, Hvørsvegna undraðirst tú? eg vil siga tær loyndardómin um kvinnuna, og um djórið sum ber hana, sum hevur tey sjey høvdini og tíggju horn.

8 Djórið, sum tú sást, var, og er ikki; og skal stíga upp úr hini botnleysu avgrund, og fara inn í glatan: og teir, sum dvøljast á jørðini, skulu undrast, hvørs nøvn vórðu ikki skrivað í lívsins bók frá grundlegging veraldarinnar, tá ið teir síggja djórið sum var, og er ikki, og tó er.

9 Og her *er* hugurin sum hevur vísdóm. Tey sjey høvdini eru sjey fjøll, á hvørjum kvinnan situr.

10 Og tað eru sjey kongar: fimm eru falnir, og ēin er, *og* hīn er ikki enn komin, og tá ið hann kemur, má hann halda áfram eitt stutt bil.

11 Og djórið sum var, og er ikki, enntá hann er hin áttandi, og er av teimum sjey, og fer inn í glatan.

12 Og tey tíggju hornini, sum tú sást, eru tíggju kongar, sum hava móttikið einkið kongadømi sum enn *er;* men móttaka mátt sum kongar ēin tíma við djórinum.

13 Hesir hava ēin huga, og skulu geva djórinum mátt sín og styrki.

14 Hesir skulu føra kríggj við Lambið, og Lambið skal vinna yvir teimum: tí at hann er Harri harra og Kongur konga: og teir, sum eru við honum, *eru* kallaðir, og útvaldir, og trúfastir.

15 Og hann sigur við meg, Vøtnini, sum tú sást, har skøkjan situr, eru fólk, og fjøldir, og tjóðir, og tungur.

16 Og tey tíggju hornini, sum tú sást uppiá djórinum, hesir skulu hata skøkjuna, og skulu gera hana oydna og nakna, og skulu eta kjøt hennara, og brenna hana við eldi.

17 Tí at Guð hevur lagt í teirra hjørtu at uppfylla vilja sín, og at semjast, og geva djórinum kongadømi teirra, inntil orðini hjá Guði skulu verða uppfylt.

18 Og kvinnan, sum tú sást, er hasin mikli staðurin, sum ræður yvir kongum jarðarinnar.

KAPITUL 18

OG eftir hesi ting sá eg ein annan eingil koma niður frá himni, havandi miklan mátt; og jørðin varð lýsnað við dýrd hansara.

2 Og hann rópti mektigani við sterkari rødd, sigandi, Bábylon hin mikla er fallin, er fallin, og er vorðin bústaðurin hjá djevlum, og haldið hjá hvørjum eklum anda, og búr hjá hvørjum óreinum og andskræmiligum fugli.

3 Tí at allar tjóðir hava drukkið av víninum av vreiðini av hennara siðloysi, og kongar jarðarinnar hava framt siðloysi við henni, og handilsmenn jarðarinnar eru vaksnir ríkir ígjøgnum ríkiligleikan av marglætum hennara.

4 Og eg hoyrdi eina aðra rødd frá himni, sigandi, Komið út úr henni, fólk mítt, at tit verði ikki luttakarar í syndum hennara, og at tit fái ikki av plágum hennara.

5 Tí hennara syndir eru roknar til himins, og Guð hevur minst til misgerðir hennara.

6 Endurgjaldið henni enntá sum hon endurgalt tykkum, og tvífaldið henni tvífalt samsvarandi við hennara verkˇ: í bikarið, sum hon hevur fylt, fyllið til hennara tvífalt.

7 Hvussu mikið hon hevur dýrðmett seg sjálva, og livað marglætisliga, so mikla pínslu og sorg gevið henni: tí at hon sigur í sínum hjarta, Eg siti ein drotning, og eri eingin einkja, og skal síggja onga sorg.

8 Tí skulu hennara plágur koma í ēinum degi, deyði, og harman, og hungursneyð; og hon skal verða fullkomiliga brend við eldi: tí at sterkur *er* Harrin Guð sum dømir hana.

9 Og kongar jarðarinnar, sum hava framt siðloysi og livað marglætisligani við henni, skulu gráta hana, og harmast yvir hana, tá ið teir skulu síggja roykin av brennu hennara,

10 Standandi langt burturifrá av óttanum fyri pínslu hennara, sigandi, Akk, Akk, hasin mikli staður Bábylon, hasin mikli staður! tí at í ēinum tíma er dómur tín komin.

11 Og handilsmenn jarðarinnar skulu gráta og syrgja yvir hana; tí at eingin maður keypir teirra vørur meira:

12 Vørurnar av gulli, og silvuri, og dýrabærum steinum, og av perlum, og fínum líni, og purpur, og silki, og skarlaki, og øllum çitrónviði, og alskyns íløtum úr fílabeini, og alskyns íløtum úr mest dýrabærum træi, og úr kopari, og jarni, og marmori,

13 Og kaneli, og angilsum, og smyrslum, og roykilsi, og víni, og olju, og fínum mjøli, og hveiti, og djórum, og seyði, og hestum, og vagnum, og trælum, og mannasálum.

14 Og ávøkstirnir, sum sál tín girnaðist eftir, eru farnir burtur frá tær; og øll ting, sum vóru krásilig og vøkur, eru farin burtur frá tær; og tú skalt finna tey ei meira yvirhøvur.

15 Handilsmenninir av hesum tingunum, sum vórðu gjørdir ríkir av henni, skulu standa langt burturifrá av óttanum fyri pínslu hennara, grátandi og venandi,

16 Og sigandi, Akk, akk, hasin mikli staðurin, sum var klæddur í fínt lín, og purpur, og skarlak, og dekkaður við gulli, og dýrabærum steinum, og perlum!

17 Tí at í ēinum tíma er so nógv ríkidømi komið til einkiðs. Og hvør skipsførari, og øll manningin á skipum, og matrósar, og so mangir sum handla eftir sjógvi, stóðu langt burturifrá,

18 Og rópaðu, tá ið teir sóu roykin av brennu hennara, sigandi,

Hvør *staður er* líkur hesum mikla staði!

19 Og teir kastaðu støv á síni høvur, og róptu, grátandi og vendandi, sigandi, Akk, akk, hasin mikli staður, hvarí vórðu gjørdir ríkir allir sum høvdu skipˇ í sjónum, uppá grund av hennara stásiligsemi! tí at í ēinum tíma er hon gjørd oyðin.

20 Fegnast yvir henni, *tú* himin, og *tit* heilagu ápostlar og prophetar; tí at Guð hevur hevnt tykkum á henni.

21 Og ein mektigur eingil tók upp ein stein, líkur einum miklum kvarnarsteini, og kastaði *hann* inn í sjógvin, sigandi, Soleiðis við harðskapi skal hasin mikli staður Bábylon verða kastaður niður, og skal verða funnin ei meira yvirhøvur.

22 Og røddin á harparum, og tónleikarum, og á floytu*leik*arum, og lúðra*blás*arum, skal verða hoyrd ei meira yvirhøvur í tær; og eingin handverkari, av hvørjumsumhelst handverki *hann veri seg*, skal verða funnin meira í tær, og ljóðið av einum mylnusteini skal verða hoyrt ei meira yvirhøvur í tær;

23 Og ljósið av einum kertaljósi skal skína ei meira yvirhøvur í tær; og røddin á brúðgóminum og á brúðrini skal verða hoyrd ei meira yvirhøvur í tær: tí at tínir handilsmenn vóru hinir miklu menn jarðarinnar; tí at viðˇ tínum gandanum vórðu allar tjóðir villleiddar.

24 Og í henni varð funnið blóðið av prophetum, og av heilagum, og av øllum sum vórðu vigin uppiá jørðini.

KAPITUL 19

OG eftir hesi ting hoyrdi eg mikla rødd av nógvum fólki í himni, sigandi; Allelūia; Frelsa, og dýrd, og heiður, og máttur, til Harrans Guðs várs:

2 Tí at sannir og rættvísir *eru* dómar hansara: tí at hann hevur dømt hina miklu skøkju, sum spilti jørðina við sínum siðloysi, og hevur hevnt blóð tænara sína av hennara hond.

3 Og aftur søgdu teir, Allelūia. Og hennara roykur reis upp um ævir og ævir.

4 Og hinir fýra og tjúgu elstu og tey fýra djórini fullu niður og tilbóðu Guð sum sat á hásætinum, sigandi, Á-mēn; Allelūia.

5 Og ein rødd kom út úr hásætinum, sigandi, Prísið Guði várum, allir tit tænarar hans, og tit sum óttast hann, bæði smáir og miklir.

6 Og eg hoyrdi sum var tað røddina av eini miklari fjøld, og sum røddina av mongum vøtnum, og sum røddina av mektigum toruslāttum, sigandi, Allelūia: tí at Harrin Guð alvaldur ræður.

7 Latum okkum vera glaðar og fegnast, og geva heiður til hansara: tí at brúdleyp Lambsins er komið, og vív hans hevur gjørt seg tilreiðar.

8 Og til hennara varð givið, at hon skuldi verða skrýdd í fínt lín, reint og hvítt: tí at tað fína línið er rættvísin hjá heilagum.

9 Og hann sigur við meg, Skriva, Signaðir *eru* teir sum eru kallaðir til brúdleypskvøldmáltíðar Lambsins. Og hann sigur við meg, Hesar eru hinar sonnu framsagnir Guðs.

10 Og eg fell við hansara føtur at tilbiðja hann. Og hann segði við meg, Síggj til *at tú geri tað* ei: eg eri samtænari tín, og brøðra tína sum hava Jesu vitnisburð: tilbið Guð: tí at vitnisburður Jesu er andi prophetīs.

11 Og eg sá himin upplatnan, og sí ein hvítur hestur; og hann, sum sat uppiá honum, *var* kallaður Trúfastur og Sannur, og í rættvísi hann dømir og førir kríggj.

12 Eygu hansara *vóru* sum ein flamma av eldi, og á høvdi hansara *vóru* mangar krúnur; og hann hevði eitt navn skrivað, sum eingin maður kendi, uttan sjálvur hann.
13 Og hann *var* klæddur við einum kappa, droyptum í blóði: og hansara navn kallast Orð Guðs.
14 Og herliðini, *sum vóru* í himni, fylgdu honum uppiá hvítum hestum, klædd í fínt lín, hvítt og reint.
15 Og út úr hansara munni gongur eitt hvast svørð, at við tí hann skuldi sláa tjóðirnar: og hann skal stjórna teimum við einum stavi av jarni: og hann treður vínpersuna av grimmleikanum og vreiðini hjá Almáttuga Guði.
16 Og hann hevur á kappa *sínum* og á síni lend eitt navn skrivað, KONGUR KONGA, OG HARRI HARRA.
17 Og eg sá ein eingil standandi í sólini; og hann rópaði við harðari rødd, sigandi til alra fuglanna sum flúgva í miðjum himni, Komið og savnið tykkum saman til kvøldmáltíðar hins mikla Guðs;
18 At tit mega eta kjøtið á kongum, og kjøtið á herovastum, og kjøtið á mektigum monnum, og kjøtið á hestum, og á teimum ið sita á teimum, og kjøtið á øllum *monnum, bæði* fríum og trælum, bæði smáum og miklum.
19 Og eg sá djórið, og kongar jarðarinnar, og herliðini hjá teimum, savnaði saman at føra kríggj ímóti honum sum sat á hestinum, og ímóti herliði hansara.
20 Og djórið varð tikið, og við honum hin falski prop<u>h</u>eturin sum virkaði kraftagerðir frammi fyri honum, við hvørjum hann villleiddi teir sum høvdu móttikið merki djórsins, og teir sum tilbóðu mynd hansara. Hesir báðir vórðu kastaðir livandi inn í ein eldsjógv, brennandi við svávuli.
21 Og leivdin vórðu vignir við svørðinum hjá honum sum sat uppiá hestinum, hvørt *svørð* útgekk út úr munni hansara: og allir fuglarnir vórðu mettaðir við kjøti teirra.

KAPITUL 20

OG eg sá ein eingil koma niður frá himni, havandi lykil hinnar botnleysu avgrundar og eina mikla ketu í síni hond.
2 Og hann legði hald á drekan, handan gamla høggormin, sum er Djevulin, og Satan, og bant hann túsund ár,
3 Og kastaði hann inn í hina botnleysu avgrundina, og lokaði hann inni, og setti eitt innsigli uppá hann, at hann skuldi villleiða tjóðirnar ei meira, til tey túsund árini skuldu verða uppfylt: og eftir tað má hann verða loystur eina stutta tíð.
4 Og eg sá trónur, og teir settust uppá tær, og dómur varð givin teimum: og *eg sá* sálir teirra sum vórðu hálshøgdir fyri Jesu vitnisburð, og fyri Guðs orð, og sum høvdu ikki tilbiðið djórið, eiheldur mynd hansara, eiheldur høvdu móttikið *hansara* merki uppá ennir síni, ella í hendur sínar; og teir livdu og ráddu við <u>C</u>hristi túsund ár.
5 Men restin av teimum deyðu livdu ikki aftur, fyrrenn tey túsund árini vóru fullførd. Hetta *er* hin fyrsta uppreisnin.
6 Signaður og heilagur *er* hann sum hevur lut í tí fyrstu uppreisnini: á slíkum hevur hin annar deyðin ongan mátt, men teir skulu vera prestar hjá Guði og hjá <u>C</u>hristi, og skulu ráða við honum túsund ár.
7 Og tá ið tey túsund árini eru útrunnin, skal Satan verða loystur úr fongsli sínum,
8 Og skal fara út til at villleiða tjóðirnar sum eru í teimum fýra

fjórðingum jarðarinnar, Gôg, og Má´gôg, at savna tær saman til bardaga: talið á hvørjum *er* sum sandur havsins.

9 Og teir fóru niðan á breidd jarðarinnar, og umringaðu leirin hjá hinum heilagu íkring, og hin háttelskaða staðin: og eldur kom niður frá Guði út úr himni, og uppslúkaði teir.

10 Og djevulin, sum villleiddi teir, varð kastaður inn í sjógvin av eldi og svávuli, har djórið og hin falski prop<u>h</u>eturin *eru,* og skulu verða pínslaðir dag og nátt um ævir og ævir.

11 Og eg sá eitt mikið hvítt hásæti, og hann sum sat á tí, frá hvørs andliti jørðin og himinin flýddu burt; og tað varð funnið einkið stað fyri teimum.

12 Og eg sá hinar deyðu, smáar og miklar, standa frammanfyri Guði; og bøkurnar vórðu upplatnar: og ein onnur bók varð upplatin, sum er lívsins *bók:* og hinir deyðu vórðu dømdir út frá teimum tingunum sum vóru skrivaði í bókunum, samsvarandi við teirra verkˇ.

13 Og sjógvurin gav upp hinar deyðu sum vóru í honum; og deyði og helviti flýggjaðu upp hinar deyðu sum vóru í teimum: og teir vórðu dømdir hvør maður samsvarandi við teirra verkˇ.

14 Og deyði og helviti vórðu kastaði inn í eldsjógvin. Hetta er hin annar deyðin.

15 Og hvørsumhelst *ið* fanst ikki skrivaður í lívsins bók, varð kastaður inn í eldsjógvin.

KAPITUL 21

OG eg sá ein nýggjan himin og eina nýggja jørð: tí hin fyrsti himin og hin fyrsta jørð vóru gingin undir; og tað var eingin sjógvur meira.

2 Og eg, Jóhannes, sá hin heilaga stað, nýggja Jerusalem, komandi niður frá Guði út úr himni, fyribúgvin sum ein brúður, skrýdd fyri ektamanni sínum.

3 Og eg hoyrdi eina mikla rødd út úr himni sigandi, Sí, tabernakkul Guðs *er* hjá monnum, og hann vil búgva hjá teimum, og tey skulu vera fólk hansara, og Guð sjálvur skal vera hjá teimum, *og vera* Guð teirra.

4 Og Guð skal turka burtur øll tár frá eygum teirra; og tað skal vera eingin deyði meira, eiheldur sorg, ella grátur, eiheldur skal tað vera nøkur pína meira: tí hinir fyrru lutirnir eru gingnir undir.

5 Og hann, sum sat uppiá hásætinum, segði, Sí, eg geri øll ting nýggj. Og hann segði við meg, Skriva: tí at hesi orðini eru sonn og trúføst.

6 Og hann segði við meg, Tað er gjørt. Eg eri <u>A</u>lpha og Omega, byrjanin og endin. Eg vil geva honum, sum er tyrstur, av kelduni av lívsins vatni fyri einkið.

7 Hann, sum yvirvinnur, skal arva allar lutir; og eg vil vera Guð hansara, og hann skal vera sonur mín.

8 Men hinir óttafullu, og vantrúgvandi, og hinir andstyggiligu, og myrðarar, og horkallar, og gandakallar, og avgudadýrkarar, og allir lygnarar, skulu hava lut sín í sjógvinum sum brennur við eldi og svávuli: sum er hin annar deyðin.

9 Og tað kom at mær ēin av teimum sjey einglunum sum høvdu hinar sjey skálirnar, fullar av teimum sjey síðstu plágunum, og talaði við meg, sigandi, Kom higar, eg vil sýna tær brúðrina, vív Lambsins.

10 Og hann bar meg burtur í andanum til eitt mikið og hátt fjall, og sýndi mær handa mikla stað, hina heilagu Jerusalem,

stígandi niður út úr himni frá Guði,
11 Havandi dýrd Guðs: og hennara ljós *var* líkt einum steini — mest dýrabærum, enntá líkt einum jaspis steini, klárt sum krystall;
12 Og hevði múr — miklan og høgan, *og* hevði tólv portur, og við portrini tólv einglar, og nøvn skrivað hará, sum eru *nøvnini* á hinum tólv ættargreinum Ísraels barna:
13 Á eystur *síðu*ni trý portur; á norður *síðu*ni trý portur; á suður *síðu*ni trý portur, og á vestur *síðu*ni trý portur.
14 Og múrurin av staðinum hevði tólv grundvøllir, og í teimum nøvn hinna tólv ápostla Lambsins.
15 Og hann, sum talaði við meg, hevði eitt gylt rør til at máta staðin, og portrini hjá honum, og múrin hjá honum.
16 Og staðurin liggur ferhyrntur, og longdin er eins stór sum breiddin: og hann mátaði staðin við rørinum, tólv túsund stádiur. Longdin og breiddin og hæddin á honum eru jøvn.
17 Og hann mátaði múrin hjá honum, eitt hundrað *og* fýrati *og* fýra alnir, *samsvarandi við* mátið hjá manni, tað er, hjá einglinum.
18 Og bygnaðurin av hansara múri var *úr* jaspis: og staðurin *var* reint gull, líkt við klárt glar.
19 Og grundvøllirnir av múrinum av staðinum *vóru* skrýddir við alskyns dýrabærum steinum. Hin fyrsti grundvøllurin *var* jaspis; hin annar, sapphīr; hin triðji, ein chalsedōn; hin fjórði, ein smaragdur;
20 Hin fimti, sardonyks; hin sætti, sardis; hin sjeyndi, chrýsolit; hin áttandi, beryll; hin níggjundi, ein tōpaz; hin tíggjundi, ein chrýsoprāsus; hin ellivti, ein hýasint; hin tólvti, ein ámetýst.
21 Og tey tólv portrini *vóru* tólv perlur; hvørt ēinstakt portur var úr ēinari perlu: og strætið av staðinum *var* skírt gull, sum var tað gjøgnumskyggið glar.
22 Og eg sá einkið tempul í honum: tí at Harrin Guð Almáttugi og Lambið eru tempul hansara.
23 Og staðurin hevði ongan tørv á sólini, eiheldur á mánanum, at skína í honum: tí at Guðs dýrd lýsnaði hann, og Lambið *er* ljós hansara.
24 Og tjóðirnar av teimum, sum eru frelst, skulu ganga í ljósi hansara: og kongar jarðarinnar bera sína dýrd og heiður inn í hann.
25 Og portrini av honum skulu ikki verða afturlatin yvirhøvur um dagin: tí at tað skal eingin nátt vera har.
26 Og teir skulu bera dýrd og heiður tjóðanna inn í hann.
27 Og tað skal á ongan hátt innfara inn í hann nakað ting sum dálkar, eiheldur *hvatsumhelst ið* virkar andstygd, ella *ger* eina lygn: bert teir sum eru skrivaðir í lívsins bók hjá Lambinum.

KAPITUL 22

OG hann sýndi mær eina skíra á av lívsvatni, klára sum krystall, útgangandi út úr hásæti Guðs og Lambsins.
2 Í miðjuni av strætinum av honum, og hvørjumegin við ánna, *var* lívsins træ, sum bar tólv *sløg av* ávøkstum, *og* gav sín ávøkst hvønn mánað: og bløðini av træinum *vóru* fyri grøðingina av tjóðunum.
3 Og tað skal eingin banning vera *til* meira: men hásæti Guðs og Lambsins skal vera í honum; og hansara tænarar skulu tæna honum:
4 Og teir skulu síggja andlit hansara; og hansara navn *skal vera* í ennum teirra.

5 Og tað skal eingin nátt vera har; og teimum tørvar einkið kertaljós, eiheldur ljós av sólini; tí at Harrin Guð gevur teimum ljós: og teir skulu ríkja um ævir og ævir.

6 Og hann segði við meg, Hesar framsagnir *eru* trúfastar og sannar: og Harrin Guð hinna heilagu prophēta sendi sín eingil at sýna tænarum sínum tey tingini sum mugu brátt verða gjørd.

7 Sí, eg komi snarliga: signaður *er* hann sum varðveitir framsagnirnar av prophētiinum av hesi bók.

8 Og eg, Jóhannes, sá hesi ting, og hoyrdi *tey*. Og tá ið eg hevði hoyrt og sæð, fell eg niður at tilbiðja frammi fyri fótunum á einglinum sum sýndi mær hesi ting.

9 Tá sigur hann við meg, Síggj til *at tú geri tað* ei: tí at eg eri samtænari tín, og tína brøðra prophētanna, og teirra sum varðveita framsagnirnar av hesi bók: tilbið Guð.

10 Og hann sigur við meg, Innsigla ikki framsagnirnar av prophētiinum av hesi bók: tí at tíðin er fyri hond.

11 Hann sum er órættvísur, lat hann vera órættvísur enn: og hann sum er gravskitin, lat hann vera gravskitin enn: og hann sum er rættvísur, lat hann vera rættvísur enn: og hann sum er heilagur, lat hann vera heilagur enn.

12 Og sí, eg komi snarliga; og mítt endurgjald *er* við mær, til at geva hvørjum manni samsvarandi sum hansara verk skal vera.

13 Eg eri Alpha og Omega, byrjanin og endin, hin fyrsti og hin síðsti.

14 Signaðir *eru* teir sum gera boðini hjá honum, at teir mega hava rætt til lívsins træ, og mega ganga inn gjøgnum portrini inn í staðin.

15 Tí at uttanfyri *eru* hundar, og gandakallar, og horkallar, og myrðarar, og avgudadýrkarar, og hvørsumhelst *ið* elskar og ger eina lygn.

16 Eg, Jesus, havi sent mín eingil at vitna tykkum hesi ting í kirkjunum. Eg eri rót og ætt Dávids, *og* hin bjarta og morgunstjørnan.

17 Og Andin og brúðurin siga, Kom. Og lat hann, sum hoyrir, siga, Kom. Og lat hann, sum er tyrstur, koma. Og hvørsumhelst *ið* vil, lat hann taka lívsins vatn fyri einkið.

18 Tí at eg vitni fyri hvørjum manni sum hoyrir orðini av prophētiinum av hesi bók, Um nakar maður skal leggja afturat hesum tingunum, Guð skal leggja afturat honum tær plágur sum eru skrivaðar í hesi bók:

19 Og um nakar maður skal taka burtur frá orðunum av bókini av hesum prophētii, Guð skal taka burtur hansara part út úr lívsins bók, og út úr hinum heilaga staði, og *frá* tingunum sum eru skrivaði í hesi bók.

20 Hann, sum vitnar hesi ting, sigur, Vissuliga, eg komi snarliga. Á-mēn. Enntá so, kom, Harri Jesus.

21 Náði várs Harra Jesu Christs *veri* við tykkum øllum. Á-mēn.

ENDI.